		1998 BU	1999 BÆ	2000 BÆ	2001 BÆ
A:	**Høvuðsendamál (1.000 kr.)**	**5.723**	**5.723**	**5.723**	**5.723**
B:	**Virksemi (tal)**				
1.	**Búfólk**	20	20	20	20

C: Eindarkostnaður (kr.)				
1. Búfólk (miðalkostnaður fyri hvørt búfólk um árið).	286	286	286	286

Broytt Starvsfólkayvirlit: 22. og 23. Heimarøktin íroknað heilsusystrar.

	1998 BU	1999 BÆ	2000 BÆ	2001 BÆ
Lønarflokkur 36 ella hægri	1	1	1	1
Onnur	259,0	274,0	274,0	274,0
Tal av fulltíðarstørvum	260,0	275,0	275,0	275,0
Lønarpartur (mió. kr.)	63,4	64,4	64,4	64,4

Broytt Starvsfólkayvirlit: 23 til: Starvsfólkayvirlit 24. Eldrarøkt í Sundoynni

	1998 F	1999 Æ	2000 Æ	2001 Æ
Lønarflokkur 36 ella hægri	-	-	-	-
Onnur	31	31	31	31
Tal av fulltíðarstørvum	31	31	31	31
Lønarpartur (mió. kr.)	6,7	7,2	7,2	7,2

8.21.6.13. Vardar íbúðir, studningur til rakstur

Játtanin verður hækkað við kr. 200.000, sum eru til: »Sambýlið Eysturstræti 4«.

Broytt sundurgreinað ætlan

tús. kr.	**1998 BU**
Útreiðslujáttan	200
01. Studul	
Útreiðslur	200
54. Studul til annað virksemi	200

8.21.7. Sosialar skiparir

8.21.7.01. Vanlig forsorg. (Lógarbundin játtan)

Virksemisyvirlitið manglaði í uppskotinum:

Virksemisyvirlit

		1996 R	1997 J	1998 F	1999 Æ	2000 Æ	2001 Æ
A:	**Høvuðsendamál (1.000 kr.)**	**85.210**	**71.738**	**82.610**	**83.738**	**84.897**	**86.074**
1.	Fyribils hjálp § 9	10.041	8.000	10.200	10.404	10.612	10.824
2.	Arbeiðsloysisforsorg §9,4	25.946	26.810	26.000	26.000	26.000	26.000
3.	Varðandi veiting §13	1.610	2.000	1.530	1.561	1.592	1.624
4.	Stakútreiðslur §15	2.963	2.464	3.060	3.121	3.184	3.247
5.	Meirútreiðslur brekað barn §17	9.966	7.000	10.200	10.404	10.612	10.824

6.	Endurútbúgving §18	13.416	10.464	15.300	15.606	15.918	16.236
7.	Hjálparumboð, heilivág v.m. §18	21.268	15.000	16.320	16.642	16.979	17.319
B:	**Virksemi (tal)**	**3.063**		**3.106**	**3.106**	**3.106**	**3.106**
1.1	Fyribils hjálp §9	610		622	622	622	622
2.1	Arbeiðsloysisforsorg §9,4	1.332	1.380	1.340	1.340	1.340	1.340
3.1	Varðandi veiting §13	30		31	31	31	31
4.1	Stakútreiðslur §15	490		500	500	500	500
5.1	Meirútreiðslur brekað barn §17	382		390	390	390	390
6.1	Endurútbúgving §18	219		223	223	223	223
C:	**Eindarkostnaður (kr.)**	**27.819**		**26.597**	**26.960**	**27.333**	**27.712**
1.2	Fyribils hjálp §9	16.461		16.399	16.727	17.061	17.402
2.2	Arbeiðsloysisforsorg §9,4	19.479	19.428	19.403	19.403	19.403	19.403
3.2	Varðandi veiting §13	53.667		49.355	50.355	51.355	52.387
4.2	Stakútreiðslur §15	6.047		6.120	6.242	6.368	6.494
5.2	Meirútreiðslur brekað barn §17	26.260		26.154	26.677	27.210	27.754
6.2	Endurútbúgving §18	61.260		68.610	69.982	71.381	72.807

8.21.8. Sosialar pensiónir

8.21.8.01. Fólkapensión. (Lógarbundin játtan)

Játtanin verður hækkað við 12.0 mió.kr. orsakað av onki uppskot um broytingar í pensiónslógini er lagt fyri løgtingið. Tí verður naestsíðsta og síðsta reglubrot strikað í viðmerkingunum.

Broytt sundurgreinað ætlan tús. kr.	**1998 BU**	**1999 BÆ**	**2000 BÆ**	**2001 BÆ**
Útreiðslujáttan	12.000	12.120	12.242	12.364
Inntøkujáttan	810	818	826	835

10. Fólkapensión

Útreiðslur	**12.000**	**12.120**	**12.242**	**12.364**
52. Tilskot til einstaklingar	12.000	12.120	12.242	12.364
Inntøkur	**810**	**818**	**826**	**835**
77. Flyting frá kommunum	810	818	826	835

20. Persónligt ískoyti

Útreiðslur	-	-	-	-
52. Tilskot til einstaklingar	-	-	-	-
Inntøkur	-	-	-	-
77. Flyting frá kommunum	-	-	-	-

30. Umsorganararbeiði

Útreiðslur	-	-	-	-
52. Tilskot til einstaklingar	-	-	-	-
Inntøkur	-	-	-	-
77. Flyting frá kommunum	-	-	-	-

Virksemisyvirlitið verður broytt til niðanfyri standandi:
Broytt Virksemisyvirlit

	1996 R	1997 J	1998 F	1999 Æ	2000 Æ	2001 Æ
A: Høvuðsendamál (1.000 kr.)	**266.786**	**265.960**	**264.517**	**267.172**	**269.864**	**272.573**
2. Vanlig fólkapensión	196.705	197.075	198.000	199.980	201.980	204.000
3. Framskundað fólkapensión	9.940	9.882	10.911	11.020	11.130	11.242
4. Fólkapensión áðrenn 70	51.208	49.003	52.017	52.537	53.063	53.593
5. Persónligt ískoyti	7.088	7.000	559	575	591	607
6. Umsorganararbeiði	1.845	3.000	3.030	3.060	3.100	3.131
B: Virksemi (tal)	**5.527**	**5.444**	**5.638**	**5.694**	**5.751**	**5.809**
2.1 Vanlig fólkapensión (tal av persónum)	4.232	4.150	4.317	4.360	4.404	4.448
3.1 Framskundað fólkapensión (tal av persónum)	207	201	211	213	215	218
4.1 Fólkapensión áðrenn 70 (tal av persónum)	1.088	1.093	1.110	1.121	1.132	1.143
C: Eindarkostnaður (kr.)	**48.270**	**48.854**	**46.917**	**46.922**	**46.925**	**46.923**
2.1 Vanlig fólkapensión (miðal veiting)	46.480	47.488	45.865	45.867	45.863	45.863
3.1 Framskundað fólkapensión (miðal veiting)	48.019	49.164	51.711	51.737	51.767	51.569
4.1 Fólkapensión áðrenn 70 (miðal veiting)	47.066	44.833	46.862	46.866	46.875	46.888

8.21.8.04. Avlamispensión, (Lógarbundin játtan)
Virksemisyvirlitið verður broytt soleiðis:

Broytt Virksemisyvirlit

	1996 R	1997 J	1998 F	1999 Æ	2000 Æ	2001 Æ
A: Høvuðsendamál (1.000 kr.)	**130.841**	**131.575**	**133.775**	**136.461**	**139.200**	**141.995**
2. Minsta avlamispensión	4.321	3.890	4.589	4.682	4.775	4.870
3. Miðal avlamispensión	57.972	59.300	60.596	61.826	63.063	64.327
4. Størsta avlamispensión	63.403	63.260	63.760	65.035	66.336	67.662
5. Avlamisveiting	1.410	1.425	1.522	1.552	1.583	1.615
6. Persónligt ískoyti	3.734	3.700	3.308	3.366	3.443	3.521
B: Virksemi (tal)	**1.963**	**1.959**	**2.042**	**2.083**	**2.125**	**2.167**
2.1 Minsta avlamispensjón (fólk)	220	208	229	233	238	243
3.1 Miðal avlamispensión (fólk)	1.027	1.022	1.068	1.090	1.112	1.134

4.1	Størsta avlamispensión (fólk)	648	662	674	688	701	715
5.1	Avlamisveiting (fólk	68	67	71	72	74	75
C:	**Eindarkostnaður (kr.)**	**66.653**	**67.164**	**65.528**	**65.519**	**65.513**	**65.533**
2.1	Minsta avlamispensión (miðalveiting)	19.641	18.702	20.039	20.094	20.063	20.041
3.1	Miðal avlamispensión (miðalveiting)	56.448	58.023	56.770	56.736	56.726	56.739
4.1	Størsta lamispensión (miðalveiting)	97.844	95.559	94.599	94.528	94.631	94.632
5.1	Avlamisveiting (miðalveiting)	20.735	21.269	21.437	21.556	21.392	21.533

8.21.8.07. Einkjupensión. (Lógarbundin játtan)
Virksemisyvirlitið verður broytt soleiðis:

Broytt Virksemisyvirlit

		1996 R	**1997 J**	**1998 F**	**1999 Æ**	**2000 Æ**	**2001 Æ**
A:	**Høvuðsendamál (1.000 kr.)**	**2.423**	**2.409**	**2.769**	**2.934**	**3.111**	**3.298**
1.	Einkjupensión	1.829	1.805	2.117	2.244	2.379	2.522
2.	Persónligt ískoyti	26	25	22	23	25	26
3.	Uppískoytisveiting	568	579	630	667	707	750
B:	**Virksemi (tal)**	**85**	**79**	**95**	**101**	**108**	**114**
1.1	Einkjupensión (fólk)	53	50	60	63	67	71
2.1	Persónligt ískoyti (fólk)	2	3	3	4	5	5
3.1	Uppískoytisveiting (fólk)	30	26	32	34	36	38
C:	**Eindarkostnaður (kr.)**	**28.506**	**30.494**	**29.147**	**29.050**	**28.806**	**28.930**
2.1	Einkjupensión (miðalveiting)	34.509	36.100	35.283	35.619	35.507	35.521
3.1	Persónligt ískoyti (miðalveiting	13	8	7	6	5	5
3.1	Uppískoytisveiting (miðalveiting)	18.933	22.269	19.688	19.618	19.639	19.737

8.21.9 Dagstovnar

8.21.9.01 Dagstovnar
Broyttar viðmerkingar: Aftast í viðmerkingunum skal ein setningur aftrat: *Ein eykajáttan verður veitt uppá 1,5 mió. kr. í 1997.*

8.22.1. Ymiskar útreiðslur

8.22.1.01 Rentustudningur til húsabygging. (Lógarbundin játtan)
Broyttar viðmerkingar: setningurin »Innistandandi í peningastovnum til húsabygging eru í meðal 48-50 mió kr og av hesum konti eru fleiri eldri enn 8 ár.« skal broytast til: *Innistandandi í peningastovnum til húsabygging eru uml. 41 mió. kr. Av hesum hava uml. 16 mió. kr. rokkið árunálinum fyri rentustuðli.*

Broytt sundurgreinað ætlan

tús. kr.	**1998**
	BU
Útreiðslur	**-400**
01. Rentustudningur	
Útreiðslur	**-400**
52. Stuðul til einstaklingar	-400

§ 20. Inntøkur

A. Yvirlit

Játtanaryvirlit

Túsund kr.	**Nettotal**	**Útreiðslur**	**Inntøkur**
Útreiðslutætlan	-	-	-
Inntøkutætlan	53.000	-	53.000
Løgutætlan	-	-	-
Skattir og avgjald		-	**53.000**
20.52.1. Rentur av landsins skuld			37.000
20.52.3. Ymsar inntøkur			16.000

B. Játtanir

			Útreiðslur	**Inntøkur tús. kr.**
20.52.1.	**Skattainntøkur**			
20.52.1.01.	Vanligur landsskattur	U	-	800.00
	Hjá meirilutanum	**BU**	**-**	**11.000**
	Nýggjar metingar			
20.52.1.10.	Vinningsbýtisskattur	U	-	22.000
	Hjá meirilutanum	**BU**	**-**	**9.000**
	Nýggjar metingar			
20.52.2.	**Avgjøld og tollur**			
20.52.2.04.	Tollavgjøld	U	-	15.000
	Hjá meirilutanum	**BU**	**-**	**5.000**
	Nýggjar metingar			
20.52.2.07.	Punktgjøld	U	-	150.000
	Hjá meirilutanum	**BU**	**-**	**12.000**
	Nýggjar metingar			
20.52.3.	**Ymsar inntøkur**			
20.52.3.01.	Útluting frá Figgingargrunninum	U	-	32.500
	Hjá meirilutanum	**BU**	**-**	**16.000**
	Nýggjar metingar			

Viðmerkingar

20.52.1. Skattainntøkur

20.52.1.01. Vanligur landsskattur
Pr. 30. november eru 709,0 mió. kr. innkomnar. Framroknað til eitt heilt ár verður roknað við at inntøkan verður 811 mió. kr. Roknað verður við somu inntøku í 1998.

Broytt sundurgreinað ætlan **tús. kr.**	**1998** **BU**
Inntøkujáttan	11.000
01. Vanligur landsskattur	
Inntøkur	**11.000**
61. Skattur og avgjald	11.000

20.52.1.10. Vinningsbýtisskattur
Roknað verður við eini útluting frá Føroya Banka uppá í minsta lagi 75 mió. kr.

Broytt sundurgreinað ætlan tús. kr.	**1998** **BU**
Inntøkujáttan	9.000
01. Vinningsbýtisskattur	
Inntøkur	**9.000**
61. Skattur og avgjald	9.000

20.52.2. Avgjøld og tollur

20.52.2.04. Tollavgjøld
Pr. 30. november eru 18,7 mió. kr gjaldsroknaðar. Fyri alt árið verður inntøkan væntandi 20 mió. kr. Roknað verður við somu inntøku í 1998.

Broytt sundurgreinað ætlan **tús. kr.**	**1998** **BU**
Inntøkujáttan	5.000
01. Tollavgjøld	
Inntøkur	**5.000**
61. Skattur og avgjald	5.000

20.52.2.07. Punktgjøld
Pr. 30. november eru 151,7 mió. kr. gjaldsroknaðar. Fyri alt árið verður inntøkan væntandi 162 mió. kr. Roknað verður við somu inntøku í 1998.

Broytt sundurgreinað ætlan

tús. kr.	**1998**
	BU
Inntøkujáttan	12.000
01. Punktgjøld	
Inntøkur	**12.000**
61. Skattur og avgjald	12.000

20.52.3. Ymsar inntøkur

20.52.3.01. Útluting frá Figgingargrunninum

Roknað verður við eini útluting frá Føroya Banka uppá í minsta lagi 75 mió. kr.

Broytt sundurgreinað ætlan

tús. kr.	**1998**
	BU
Inntøkujáttan	16.000
01. Útluting	
Inntøkur	**16.000**
67. Rentuinntøkur og vinningsbýti	16.000

§ 25. Gjaldføri

Yvirlit

Játtanaryvirlit

Túsund kr.	**Nettotal**	**Útreiðslur**	**Inntøkur**
Útreiðsluætlan	-	-	-
	200.000	200.000	
Inntøkuætlan	-		-
	167.521		167.521
Løguætlan	-	-	
Broytingar í virði og skuld	-	-	
		169.381	
25.60.1. Ymsar broytingar		-	-
		169.381	
Útvegan av gjaldføri	-	-	
			200.000
25.64.1. Útvegan		-	-
			200.000

B. Játtanir

		Útreiðslur	**Inntøkur tús. kr.**
25.60.1. Ymsar broytingar			
25.60.1.01. Broytingar í "virði" og "skuld v.m."	U	18.118	-

	Hjá meirilutanum	**BU**	**-**	**-**
			169.381	
	Nýggjar metingar			
25.64.1.	**Útvegan**	U	-	470.000
25.64.1.01.	Útvegan av gjaldføri	**BU**	-	-
				200.000

Viðmerkingar

25.60.1. Ymsar broytingar

25.60.1.01. Broytingar í »virði« og »skuld v.m.«

Broytt sundurgreinað setlan	
tús. kr.	**1998**
	BU
Inntøkujáttan	**-169.381**

10. Ogn

91. Áogn	-
92. Tøkur peningur	-169.381

20. Útjavningarkonto og skuld

94. Útjavningarkonto	-
95. Roknskapartøkniligar-, avst. og skrás.konti	-
96. Stuttfreistað skuld	-

Broyttar viðmerkingar:

að 91:	Goymslur	0
	Skatta-, toll- o.l. skuldarar	0
	Tænastu- og vøruskuldarar	0
	Millumrokning kommunur og alm. stovnar	0
	Aðrir skuldarar	0
	Tíðaravmarkingar	0

að Skatta-, toll- o.l. skuldarar. Gjaldstovan heldur, at tá ið árliga verður avsett upp á virðisleysar debitorar, so er gjørligt at halda ein nullvøkstur

að 92. Um yvirskot er á fíggjarlógini eftir rakstrar-, anleggs- og útlánsútreiðslur, so veksur ágóði landskassans við hesum tali. Er hinvegin halli á gjaldførispostunum t.d. um skattaeftirstøðurnar veksa, so minkar hetta um tøka pening landskassans. Somuleiðis minkar tað um tøka pening landskassans, um t.d. landskassin tekur 200 mió. kr. í láni, men skal gjalda 300 mió. kr. aftur.

Broytingin í tøkum peningi er sostatt eitt residual, ið kann roknast sum niðanfyri:

Úrslit eftir rakstrar-, løgu- og útlánsútreiðsur		**48.737**
+	Gjaldførisbroytingar á "virði og skuld (ekskl. tøkur og bundin peningur)	0
+	Upptikin lán - afturgjald av lánum	-200.000
=		
Broyting í tøkum og bundnum peningi		**-151.263**

ad 94: Av tí, at útjavningarkonto nesisum bara virkar sum ein tøknilig konto, so er tað so at siga ógjørligt at meta um upphæddina, sum kemur at standa á kontoini.

25.64.1. Útvegan

25.64.1.01. Útvegan av gjaldføri
Broytt sundurgreinað ætlan

1ús. kr.	**1998**
	BU
Útreiðslujáttan	-200.000

01. Útvegan

Útreiðslur	
87. Upptøka av lánum	-200.000

Broyttar viðmerkingar:
Landskassans fíggjartørvur verður í 1998 mettur til 470 mió. kr. Av hesum verða 270 mió. kr. fíggjaðar við lánsbrævasølu. Harumframt verða 200 mió. kr. nýttar av gjaldføri landskassans at niðurgjalda skuld við.

Játtanarskipanin

Fíggjarlógin

Fíggjarlógin er grundarlag undir virkseminum hjá landinum í einum fíggjarári.

Sambært § 43, stk. 2 í stýriskipanarlógini má eingin útreiðsla verða goldin, uttan at heimild er fyri henni í teirri fíggjarlóg ella aðrari játtanarlóg, ið er í gildi, tá ið ávist verður.

Stýriskipanarlógin ásetur, at landsstýrið leggur trý sløg av játtanarlóggávu fyri løgtingið:

- fíggjarlóg,
- møguliga *bráðfeingis játtanarlóg*, sum § 43, stk. 3 í stýrsiskipanarlógini ásetur, at landsstýrið skal leggja fyri tingið, um útlit eru fyri, at fíggjarlógin ikki verður samtykt áðrenn fíggjarárið byrjar
- eykafíggjarlóg, ið tunliheldur allar eykajáttanir, sum fíggjarnevndin hevur veitt í gjøgnum árið, verða at góðkenna í seinasta lagi 31. desember sama ár. Landsstýrið hevur skyldu at leggja fram uppskot hesum viðvíkjandi innan 1. desember.

Fíggjarlógin kann seinni verða broyt við 1) *eykajáttan við løgtingslóg*, ella um málið hevur skund, 2) *fíggjarnevndin veitir eykajáttan*.

Eykajáttanir, sum fíggjarnevndin samtykkir, skulu takast við á eykafíggjarlógina.

Landsstýrismaðurin í fíggjarmálum samskipar fíggjarlógararbeiðið. Tað er hann, sum vegna landsstýrið leggur fyri løgtingið landsstýrisins uppskot um fíggjarlóg og aðrar játtanarlógir.
Bruttojáttanir og nettojáttanir
Útgangsstøðið í játtanarskipanini er, at útreiðslur og inntøkur verða játtaðar hvør sær (bruttomeginreglan). Inntøkuvøkstur heimilar tí ikki samsvarandi útreiðsluvøkstri.

Í nevndu førum verður bruttomeginreglan tó ikki nýtt:

- *Søluko*stnaður*, tá ið fastar ognir verða seldar*, verður drigin frá søluinntøkuni, soleiðis at tað er nettoinntøkan av søluni sum verður játtað.
- *Tá ið bráktir lutir verða seldir í umbýti við nýggjar*, er tað bert nettoútreiðslan, sum skal játtast.
- *Tá ið endurgjald, dagbønur o.a. í sambandi við løguarbeiði* eru endurbót fyri eykaútreiðslur, sum stovnurin hevur í sambandi við ein ítøkiligt arbeiði, verður nettoútreiðslan sett á kontoina fyri játtanina.
- Tá ið *peningur verður lagdur út* fyri annan stovn ella kommunur, t.v.s. at tað, í tí løtuni goldið verður, er greitt, at sunnu upphæddi er útreiðsla hjá øðrum lands- ella kommunalum myndugleika, og tað ikki áliggur tí útgjaldandi stovninum nøkur sjálvstøðug ábyrgd at taka á seg útreiðsluna. Um landsstovnur leggur pening út fyri annan landsstovn, er tað bartumframt eitt krav, at útgjalding og útreiðslur eru í sama fíggjarári.
- *tryggingarendurgjøld*, sí eisini 6.1.2.
- *lønarendurgjøld*

Roknskaparliga verður eisini konterað eftir bruttomeginregluni, tó so at í sambandi við tey omanfyri nevndu undantøk, verður konterað á serligum roknskaparkonti sambært Kontoskipan Landsins.

Harumframt eru játtanarsløgini *landsfyritøka og rakstrarjáttan, ikki umfatað av bruttomeginregluni*. Fyri hesi játtanarsløg verður játtanin latin sum nettoútreiðslujáttan. Hetta merkir at t.d. søluinntøkur kunnu mótsvarast av meirútreiðslum.

Sjálvt um játtanir sostatt á nøkrum økjum verða givnar sum nettojáttanir, verða útreiðslur og inntøkur settar upp fyri seg í tí sundurgreinaðu ætlanini í fíggjarlógarviðmerkingunum.

Átekningar
Á játtanarlógunum eru, umframt játtanir, eisini átekningar. Átekningar verða nýttar sum ein fskoytisáseting til ávísa játtan. T.d. kann átekning nýtast til at heimila landsstýrismanninum at átaka landskassanum skyldur, sum føra við sær útreiðslur fyri komandi ár.

Átekningar kunnu ikki nýtast til at lóggeva um viðurskifti, sum ikki beinleiðis viðvíkja játtanum.

Lógarásetingar, sum eru gjørdar við átekning, eru bert galdandi í fíggjarárinum. Tí skulu varandi fyrisitingarreglur ikki gerast við heimild í átekningum. Um átekningar skulu vera galdandi longur enn fíggjarárið, skulu tær endurtakast í komandi fíggjarlógum.

Ræði sambært játtanum
Almennar reglur

Vanligar ræðisásetingar
Ein játtan er ein heimild hjá landsstýrismanninum at hava útreiðslur til eitt ávíst endamál, ella at hava inntøkur av ávísum slag í samsvar við tær fyritreytir, sum játtanin er givin eftir.

Tá ið ein fyrisitingarlig leiðsla hevur ræðisrættindi í sambandi við játtanir, er hetta eftir *heimiling* frá landsstýrismanninum, og er tað undir teimum treytum, ið fylgja við heimilingini.

Játtanin skal nýtast samsvarandi fyritreytunum fyri játtanini. Harumframt kunnu í heimilingini verða fyrisitingarligar ásettar aðrar treytir fyri nýtslu av játtanini, eins og ræðisrætturin altíð kann takast aftur í fíggjarárinum.
Tað er ikki loyvt at flyta frá eini játtanarkonto til aðra, uttan so, at serlig heimild til tess er ásett í eini átekning til kontoina á fíggjarlógini.

Játtanarheimild skal verða fingin til vega, áðrenn rátt verður. Tá miðað verður eftir, at fíggjarlógin skal vera ein fullfíggjað fíggjarætlan fyri landsins inntøkur og útreiðslur í fíggjarárinum, er meginreglan, at heimild sambært játtan fyri eini atgerð, skal verða fingin til vega á fíggjarlógini, áðrenn rátt verður.

Játtanartíðarskeið
Ein játtan er ein *heimild at ráða í tí fíggjarárinum, sum játtanin er givin fyri.*

Um tað ikki er serlig heimild til at gjalda frammanundan ella at geva gjaldsskáa, skal miðast eftir, at tað ikki er størri munur á tíðarskeiðunum millum útreiðslur og útgjald og millum inntøkur og inngjald.

Atgerðir, sum føra við sær skyldur fyri landskassan út um tíðarskeiðið, ið játtanin er fyri, kunnu bara gerast, um serstøk heimild er fingin til vega frammanundan t.d. við serligari lóg ella átekning.

Um málið hevur skund, kann útvegast heimild at taka við skyldum, sum hava útreiðslur við sær í komandi fíggjarárum, á tann hátt, at *fíggjarnevndin góðkennir tílíkar skyldur* í sambandi við, at eykajáttan verður veitt.

Tá ið skyldur eru, sum føra til útreiðslur í fleiri fíggjarárum, skal játtan til útreiðslurnar fáast til vega hvørt fíggjarár sær.

Harumframt kann heimildin at ráða í einum fíggjarári við árini á útreiðslurnar fyri komandi fíggjarár, metast út frá *fyritreytunum fyri játtanini* í fyrsta fíggjarárinum. T.d eru byggijáttanir vanliga givnar undir teirri fyritreyt, at tann ráðandi myndugleikin kann gera avtalur, sum hava við sær byggiútreiðslur í komandi fíggjarárum, um so er, at hetta er neyðugt fyri at gera skilagóðar sáttmálar, og treytað av, at tann samlaða játtanarupphæddin, sum er góðkend til byggingina, verður hildin. Tað sama er vanliga galdandi fyri at gera leigusáttmálar, seta starvsfólk o.t.

Flyta játtan millum fíggjarár
Í sumum førum er loyvt at nýta upphæddir frá *farnum fíggjarárum*. Hetta er galdandi á økjum, har tað við eini *átekning er ásett, at tað er loyvt at flyta ónyttar játtanir til komandi fíggjarár.*

Um peningur ikki verður játtaður á eini høvuðskonto í tvey ár, og einki er bókað, er meginreglan, at heimildin at varðveita kontoina fellur burtur.

Annað
Virksemisupplýsingar, sum eru í viðmerkingunum til fíggjarlógina, eru einans av kunnandi slag, uttan tá ið tað snýr seg um lógarbundna játtan.

Vanliga er ikki loyvt at leasa. Tó kunnu sáttmálar um operationella leasing gerast, um tað eru eyðsýndir fyrimunir fyri landskassan at leasa í staðin fyri at keypa. Sáttmálar upp á meira enn kr. 250.000, skulu góðkennast av Fíggjarmálastýrinum.

Hinvegin kunnu sáttmálar ikki gerast fyri fíggjarliga leasing, sum reelt kemur í staðin fyri keyp ella bygging.

Serstakar ásetingar fyri tey einstøku játtanarsløgini

Játtanarsløg
Ræðisreglurnar eru tengdar at fylgjandi fimm játtanarsløgum:

- **Rakstrarjáttan**
- Løgujáttan
- Lógarbundin játtan
- Landsfyritøka
- Onnur játtan

Undir pkt. B »Játtanir« í fíggjarlógartekstinum er ásett í klombrum aftan fyri høvuðskontoheitið, hvat slag av játtan, talan er um. Um einki stendur, so er tað »Onnur játtan«.

Játtanarslagið er treytað av, hvat slag av stýring ein ynskir:

Rakstrarjáttan verður sum útgangsstøði nýtt, tá endamálið við játtanini serliga er ætlað at verða rokkið við almennum rakstarvirksemi, tvs. við at sela starvsfólk, og at hava neyðugar útreiðslur í tí sambandinum. Hetta uppi í er keyp av tilfari og tænastum og rakstur av bygningum. Rakstrarjáttan er ein nettoútreiðslujáttan, og merkir tað, at meirinntøkur geva rætt til at hava samsvarandi meirútreiðslur.

Løgujáttan verður sum meginregla nýtt til at selja, keypa, konstruera og gera bygningar og løgur. Harum framt verður henda játtan nýtt, tá løgustuðul ella útlán verða veitt til fíggiligar byggiætlanir, sum ikki eru lógarbundnar.

Landsfyritøka verður nýtt, tá virksemið hjá almennum stovni í høvuðsheitum er vinmuligt, og tað tí er skilabest at geva leiðsluni størri møguleikar til at laga virksemið eftir marknaðarviðurskiftunum.

Lógarbundin játtan er mett játtanartøl. Hetta merkir, at játtanin á fíggjarlógini bara heimilar útreiðslum ella inntøkum, um sjálv játtanarupphæddin ikki er bindandi ásett. Hetta kemst av, at tað er bindandi ásett í aðrari lóggávu, hvør kann fáa peningin og hvør skal rinda, og hvussu stór upphæddin skal verða. Sum dømi kann fólkapensión verða nevnd. Landskassin hevur tí skyldu at rinda, líka mikið, hvussu stór játtanarupphædd er ásett í fíggjarlógini.

Onnur játtan verður nýtt í serligum førum, tá játtanarendamálið er ætlað at vera rokkið við at veita studul, lán v.m. ella við at fáa til vega inntøkur, sum ikki eru náttúrliga knýttar at rakstrar- og løguvirkseminum. Vanliga verður hetta játtanarslag nýtt, tá hini játtanarsløgini ikki hóska.

Rakstrarjáttan

Rakstrarjáttan, útreiðslur

Fyri rakstrarjáttan eru tær almennu ásetingarnar galdandi, umframt niðanfyri nevndu ásetingar.

Rakstrarjáttan, er ein *nettoútreiðsluhjáttan til tann ella teir* landsstovnar, sum høvuðskontoin fevnir um. Hetta hevur við sær, at stovnurin kann hava rakstrarútreiðslur og inntøkur samsvarandi inngangunum í viðmerkingunum til høvuðskontoina.

Hóast virksemið innan fyri økt, sum høvuðskontoin fevnir um, verður minni enn roknað varð við í frágreiðingini í inngangunum til viðmerkingarnar, og sjálvt um størri skynsemisbroytingar eru framdar enn roknað varð við, tá ætlanin var løgd, so er ikki loyvt til betra støðið á almennum tænastum í økinum meiri, enn upprunaliga ætlað.

Stovnar, ið gera ætlanir um byggi- og løguarbeiði, kunnu nýta pening til málsfyrireiking, tvs. gera tørvmetingar og gera ætlanaruppskot. Útreiðslur til framhaldandi ætlanararbeiði og projekteringsútreiðslur krevja serstaka løgujáttan.

Standardkontosundurgreiningin í viðmerkingunum er bert bindandi í teirri merking, at upphæddir ikki frítt kunnu flytast frá aðrari rakstrarkonto til lønarkonto.

Starvsfólk

Landsstýrisins starvseftirlit førir við sær, at ávís starv skulu góðkennast áðrenn tey verða stovnað. Starvseftirlitið fevnir um tænastumannastørv og øll onnur starv við eini løn svarandi til tænastumannastørv í 36. lønarflokki ella hægri.

Uppskot um at stovna nýggj starv, sum eru fevnd av starvseftirlitinum, skulu sendast til lønardeildina í fíggjarmálastýrinum. Saman við uppskotinum skulu sendast upplýsingar sum eru neyðugar til viðgerðina.

Eitt góðkent starv í lønarflokki 36. ella hægri kann altíð nýtast í einum hægri lønarflokki.

Innan fyri lønarrammuna og góðkend størv, ásetir aðalstýrið/stovnurin sjálvur normeringina (samanseting av starvsfólkanýtslu).

Rakstrarjáttan, inntøkur
Inntøkur á eini rakstrarjáttan geva teirri fyristtingarleiðslu, ið kann ráða yvir einari høvuðskonto, heimild at hava tær inntøkur, sum eru knýttar at rakstrinum av tí ella teimum stovnum, ið játtanin fevnir um.

Rakstrarjáttan, inntøkuføggjað virksemi
Heimild at hava inntøkuføggjað virksemi, verður givin á játtanarlógini. Virksemið verður útgreinað fyri seg á undirkonto til ta høvuðskonto, sum virksemið hoyrir til. Inntøkuføggjað virksemi hevur ikki karmar um rakstrarætlanir ella lønarupphæddir, men einans rakstrarkarmar.

Fyri inntøkuføggjað virksemi eru tær almennu ræðisásetingarnar galdandi – tó við teimum niðanfyri nevndu undantøkunum. Í sambandi við inntøkuføggjað virksemi kunnu vera vanligar útreiðslur svarandi støði num á virksemi og inntøkum.

Teir landsstovnar og sjálvsognarstovnar, har landskassin rindar í minsta lagi helmingin av rakstrarútreiðslunum, kunnu fáa heimild til at hava inntøkuføggjað virksemi, um hetta virksemið lýkur niðanfyri standandi treytir:

- Viðskiftafólkini hava *ikki* nakra *skyldu at taka móti* tænastuni ella vøruni.
- Stovnurin skal kunna *skilja* framleiðsluna av vørum ella tænastum, sum ætlanin er at hava sum inntøkuføggjað virksemi, frá øðrum uppgávum hjá stovninum.
- Tað inntøkuføggjaða virksemið skal *náttúrliga hanga saman* við vanliga virkseminum, sum stovnurin annars hevur fingið álagt at loysa.

Kostnaðurin fyri tænastur ella vørur, ið inntøkuføggjað virksemi fevnir um, skal ásetast soleiðis, at hann *ikki er kappingaravlagandi* mótvegis privatum og øðrum almennum kappingarneytum, og langtíðar miðalkostnaðurin skal verða føggjaður.

Um tað inntøkuføggjaða virksemið hevur einkarrætt ella støðu, ið líkist einkarrætti, so er tann prísurin, sum dekkar langtíðarkostnaðin, samstundis *hámarksprísurin*, ið kann setast á vøruna ella tænastuna, tá ið vøran verður seld í Føroyum.

Langtíðar miðalkostnaðurin er tað, sum tað kostar í miðal at gera eina ávísa vøru ella veita eina ávísa tænastu gjøgnum eitt longri tíðarskeið. Sum partur av kostnaðinum er at rokna:
- beinleiðis útreiðslur, tvs. útreiðslur, sum beinleiðis eru knýttar at tí einstøku vøruni ella tænastuni (t.d. løn, tilfar ella uttanhýsis tænastur), og
- óbeinleiðis útreiðslur, tvs. útreiðslur, sum ikki beinleiðis kunnu knýtast at tí einstøku vøruni ella tænastuni, men sum kann roknast út frá útreiðslum sambært rakstrarætlan fyri viðkomandi ár (t.d. høli, innbúgv, edv, skrivstovulutir og leiðsla), umframt
- aðrar óbeinleiðis útreiðslur, sum kunnu vera rakstrarútreiðslur frá farnum árum, ella útreiðslur, ið stava aðrastaðni frá á landsins rakstrarætlan (t.d. serligari løgujáttan).

Undir inntøkuføggjaðum virksemi kunnu havst inntøkur og útreiðslur, ið vanliga koma undir løgujáttan.

Í føggjarlógaruppskotinum verður gjørd rakstrarætlan fyri útreiðslur av inntøkuføggjaðum virksemi lutvíst grundað á ætlaðar útreiðslur, og lutvíst á ætlaða nýtslu av inntøkum annars.

Í viðmerkingum til føggjarlógaruppskotið verður greitt frá *slagi av inntøkuføggjaðum virksemi* og hvussu stórt hetta virksemi er. *Skilt verður millum inntøkuføggjað virksemi og vanligt virksemi hjá stovninum.* Hetta verður gjørt á eini undirkonto.

Útreiðslur til vørur og tænastur, sum lutvíst verða nýttar til vanligt virksemi og lutvíst verða nýttar til inntøkuføggjað virksemi, skulu bíðast sundur eftir veruligu nýtsluni til ávikavist vanligt og inntøkuføggjað virksemi.

Fyri inntøkuføggjað virksemi eru ongar bindingar ímóti at flyta pening til lønarútreiðslur frá øðrum rakstri, men lønarútreiðslur kunnu einans nýtast til tað virksemið, sum inntøkuføggjaða virksemið fevnir um.

Til inntøkuføggjað virksemi kunnu *starvsfólk* bert setast, um støðvini verða føggjað við inntøkum. Fyr tað neyðugt fyri at tryggja stovnin føggfarliga, skulu setanir vera tíðar- ella uppgávuavmarkaðar.

Ikki kunnu setast tænastumenn ella tænastumannalíknandi starvsfólk við beinleiðis tilknýti til inntøkuføggjað virksemi.

Tey fólk, her upp í sáttmálasettir leiðarar, sum verða sett í starv beinleiðis til inntøkuføggjað virksemi, verða sett eftir vanligu sáttmálatreytunum, sum eru galdandi á økinum.

Lønarútreiðslur til starvsfólk, sum lutvíst luttekur í inntøkuføggjaðum virksemi, verða konteraðar alt eftir, hvussu stóran part tey hava verið í ávikavist vanligum virksemi og inntøkuføggjaðum virksemi.

Løgujáttanir

Løgujáttanir viðvíkja løguvirksemi, her uppí keyp og søla av bygningum v.m. Undir hesar játtanir verða bókaðar:

- Løgutátreiðslur og løguinntøkur
- Løgustuðul og útlán til einstakar ætlanir, tó ikki lógarbundnar
- Avdráttir av veðrættarskuld

Hetta hevur eitt nú við sær, at keyp av føstum ognum og nýbygging kunnu føggjast á somu játtan.

Løgujáttan, løguútreiðslur

Løgujáttan gevur heimild til at gera avtalur, sum føra við sær útreiðslur í einum komandi føggjarári, um avtalan er neyðug við atliti til tann valda útbjóðingarháttin, og treytað av at tann samlaða upphæddin, ið er góðkend til løguarbeiðið, verður hildin.

Ræðisrætturin er tengdur at, um ætlanin er sett á føggjarlógina, ella um eykajáttan er fingin við lóg ella frá føggjarnevndini. Í sambandi við týðandi broytingar í tí einstøku løguætlanini, er tað eisini av týdningi, um broytingin fær gildi eftir, at nýggj føggjarlóg er samtykt, ella um ætlanin er at broytingin verður gjørd í einum verandi føggjarári.

Ætlanir, sum eru á føggjarlógini.

Fyri ætlanum, sum eru við í viðmerkingunum til føggjarlógina, kann fysisitingarleiðslan ráða uttan at skula leggja málið fyri tann játtandi myndugleikan. Hetta er treytað av, at samlaðu upphæddin ikki broytist, og at útreiðslurnar kunnu haldast innan fyri galdandi játtan.

Tiltøk, sum føra til týðandi ætlanarbroytingar, her uppí í tiltøk, sum hækka upprunaliga metta kostnaðinum fyri tað samlaðu ætlanina, kunnu í høvuðsheitum bara framjast, um serstøk heimild er fingin til vega frá tí játtandi myndugleikanum.

Verður sæð burtur frá omanfyri nevndu ásetingum um broytingar í samlaðu útreiðslunum fyri tær einstøku ætlaninar, er loyvt at flyta í millum fleiri løguarbeiði undir somu høvuðskonto, alt eftir, hvussu útreiðslurnar falla í teimum ætlanum, sum eru umfataðar av játtanini.

Í teimum førum, har serstøk lóggáva er um ætlanir, sum eru við í løgujáttanini, og tað í hesum ætlanum er

roknað við einum ávísum løgutíðarskeiði, kann býtið av játtanini bara broytast, um so er, at tílíkar broytingar ikki ávirka tað ætlaða løgutíðarskeiðið stórvegis.

Nýggjar ætlanir í fíggjarárinum
Ætlanir, sum skulu fíggjast við eini løgujáttan, og sum ikki eru við í viðmerkingunum til játtanina, skulu leggjast fyri løgtingið (um málið hevur skund, so fyri fíggjarnevndina), sum uppskot til eykajáttan, áðrenn tær verða settar í verk.

Ítøkiligar játtanir til útvegan av ognum
Um ognartøka verður gjørd, kann tað endurgjald, sum verður ásett av ognartøkumyndugleikanum rindast, hóast tann játtaða upphæddin ikki røkkur til.

Í øðrum førum kann bara farast upp um ta játtaðu upphæddina, um tilskilað er í játtanini, at keypsprísurin er mettur (óvissa hevur verið um keypsprísin o.a.)

Løgujáttan, inntøkur
Løguinntøkur eru inntøkur av avhending av føstum ognum o.ø., endurrindan í sambandi við bygging og løgugerð, ið er gjørd fyri onnur, endurgjald fyri liðug løguarbeiði og avskrivingar av ognum og løgum.

Søla av landsins føstu ognum kann í høvuðsheitum bara fara fram, um ognin hevur verið boðin út alment.

Løguinntøkur kunnu hert havast, um so er at heimild er fyri hesum í galdandi játtanarlóg, annars verða tær at taka við í eykajáttanarlóg, tó við teimum niðanfyri nevndu undantøkum:

- Inntøkur sum fáast í sambandi við ognartøku av almennum ognum,
- Endurrindan, endurgjald o.a. í sambandi við løguarbeiði.
  Hesar skulu samsvarandi teimum almennu rokinskaparmeginreglunum, inntøkuførast so skjótt, sum møguligt er at gera upp. Endurgjald og dagbøtur, sum verða móttiknar sum endurrindan fyri hildnar eykaútreiðslur í sambandi við ítøkiligar ætlanir, verða bókað undir bygging og løgufremleiðsla standardkonto 31, ella útvegan av løgu o.ø standardkonto 32 sum nettobóking sambært Kontoskipan landsins.

Ræði, sum hevur við sær minni søluinntøku enn ætlað, tá ið játtanin varð givin, kann bara koma fyri í líknandi førum, sum tá tað í sambandi við keyp av ognum er heimild at hava størri útreiðslur, enn ta játtaðu upphæddina.

Lógarbundin játtan
Lógarbundin játtan verður fyrst og fremst nýtt, tá ið talan er um lógarbundnan stuðul, heruppi í er lógarbundin fløgustuðul. Hetta játtanarslag verður tó eisini nýtt fyri ávís sløg av inntøkum, sum eru tengdar at tí lógarbundna stuðlinum.

Vanliga skulu aðrar inntøkur enn rakstrar- og løguinntøkur tó bókast undir heitinum: Onnur játtan.

Lógarbundnar útreiðslur
Lógarbundnar útreiðslur fevna um stuðul, t.d. tá ið stuðulsmóttakarin sambært lóggávu hevur rættarkrav til eina ávísa stuðulsupphædd, og tá ið stuðulsupphæddin ella útrokningargrundarlagið er ásett í lógini.

Fyri lógarbundnar útreiðslur er eisini galdandi, at tað, umframt nýtsluna úr fíggjarlógini, kunnu vera størri útreiðslur, um tann samlaða stuðulsupphæddin verður størri enn mett var, tá ið rakstraætlanin varð løgd.

Játtanarslagið landsfyritøka
Fyri landsfyritøkur eru í høvuðsheitum tær somu ásetingar galdandi fyri rakstrarjáttanir, tó við teimum niðanfyri nevndu undantøkum.

Játtanin hjá landsfyritøkum er eitt nettotal, sum er ein játtanarkarmur til nettoútreiðslur hjá fyritøkuni.

Fyri landsfyritøkur kann tað harumframt verða heimilað við áteking at hava eina skipan til at flyta fram ella nýta yvir-/og undirskot eftir.

Vanligu avmarkingarnar frá at flyta frá rakstrarkonto til lønarkonto eru ikki galdandi fyri landsfyritøkur.

Heldur ikki eru landsfyritøkur umfataðar av karmum um lønarupphæddir, men nýggj tænastumannastørv og onnur størv í lønarflokki 36. ella hægri, skulu góðkennast av lønardeildini í fíggjarmálastýrinum.

Onnur játtan
Fyri játtanarslagið »Onnur játtan« galda almennu reglurnar smb. parti 4.1. Onnur játtan verður annars nýtt, tá einki av hinum játtanarsløgunum er hóskandi, serstakliga til ítøkiligar studningsjáttanir. Lønarútreiðslur kunnu ikki rindast av hesum játtanarslag.

Nýggjar og broyttar atgerðir í fíggjarárinum
Tað kann tó henda, at tørvur er á at fremja tiltøk í fíggjarárinum, ið ikki var gjørligt at taka hædd fyri, tá ið fíggjarlógaruppskotið varð gjørt. Í tílíkum førum kann heimild útvegast frammanundan á tann hátt, at løgtingið veitir eykajáttan við løgtingslóg. Um málið hevur skund, kann fíggjarnevndin veita eykajáttan. Eykajáttanir, ið fíggjarnevndin veitir, verða tiknar við á eykafíggjarlóg.

Fyri hesi undantøk er eykajáttan tó ikki neyðug:

Útreiðslur uttan játtan

Veðhaldsútlegg o.a.
Óvæntaðar útreiðslur, eitt nú til at gjalda effektivt landskassaveðhald e.l.

Harumframt kann á sama hátt rindast fyri útreiðslur, ið landið samkvæmt dómi hevur skyldu at rinda, ella um tað má metast sum rættiligt sannlíkt, at landið hevði fingið tað álagt, um málið fór í rættin. Vanliga eigur ein meting frá advokatinum hjá landinum at fyriliggja í tí seinna førinum.

Tryggingarendurgjald
Tryggingarendurgjald kann nýtast til at gera neyðugar ábøtur á tað skadda. Um skaðaupphæddin fyri ein totalskaða er meira enn kr. 1 mió. skal málið leggjast fyri landsstýrismannin í fíggjarmálum, til støðutakan um heimild skal fáast til vega frá játtanarmyndugleikanum áðrenn rátt verður.

Umsiting av landsins ognum
Sum liður í umsitingini av *landsins ognum*, kann gerast neyðugt at taka við útreiðslum fyri heilt ella partvíst at varðveita virði, t.d. útreiðslur til at útinna ella fullgera dóm (lóghald og úttøku) ella útreiðslur, sum standast av sølu av eini ogn, sum er yvirtikin við tvingsilssølu. Tá tílíkar útreiðslur eru óvæntaðar, kunnu tær átakast uttan játtan. Somuleiðis kann eitt krav avskrivast ella niðurskrivast beinleiðis, um tað hevur víst seg nýttuleyst at krevja peningin inn við rættarsókn ella um landsstýrisins advokatur metir, at tað er heilt ella partvís nýttuleyst at krevja peningin inn.

Tó er galdandi fyri krøv, sum liggja í FSL-debitorskipanini, at kravið verður avskrivað, tá ið tað verður flutt í DEMM-skipanina. Føroya gjaldstova ásetir treytir fyri avskrivingini.

Hesar ásetingar merkja tó ikki, at kravið verður slept mótvegis skuldaranum.

Fremmand fígging av almennum virksemi og íløgum
Talan er um pening, sum kemur aðrastaðni frá enn beinleiðis við játtanarlóg. T.d. tilskot, gávur, granskingarstyrk, pening til ávísar verkætlanir og verkevni. Fyri stovnurin kann fara undir tílíkt virksemi, sum verður

fíggjað aðrustaðni frá enn av játtnarlóg, skal loyvi um hetta fyriliggja frá aðalstýri stovnsins, og umsitingin skal fara fram eftir somu somu reglum, sum eru álagdar sambært játtanini á fíggjarlógini.

Minnilutin (Jóannes Eidesgaard)
Minnilutin (Jóannes Eidesgaard) hevur hesar almennu viðmerkingarn til fíggjarlógaruppskotið fyri 1998 og setur eftirfylgjandi broytingaruppskot fram.

Minnilutin ger eins og í fjør aftur vart við, at viðgerðin av fíggjarlógaruppskotinum í fíggjarnevndini er fyri lítið at rokna. Iðin nógv av fundum verða hildnir, har landsstýrismenn, løgmaður og tingformaður við teirra fylgi av embætisfólkum greiða frá og svara spurningum. Somuleiðis verða eisini umboð fyri ymiskar stovnar og felagsskapir bidnir at møta í nevndini og greiða frá um útlitini fyri komandi árið. Á henda hátt hevur fíggjarnevndin fingið nógva vitan um ymisku játtanirnar, men tó uttan at nevndin ger brúk av hesum til nakra viðgerð og enn minni til nakra politiska viðgerð.

Frá tí degi, at seinastu gestirnir vitjaðu nevndina, er engin politiska viðgerð farin fram í nevndini. Landsstýrismaðurin í fíggjarmálum boðaði fyrst í november mánaði frá, at seinasta freist hjá landsstýrinum til at leggja fram broytingaruppskot var sett til 20. nov. 1998, men fyrst í gjár varð broytingaruppskot landsstýrisins endaliga lagt fyri fíggjarnevndina.

Ein meiriluti í fíggjarnevndini hevur síðan tikið hetta uppskot til sín, og leggur tað uttan stórvegis viðgerð fram sum sítt egnað.

Uppskotið hjá meirilutanum hevur eitt yvirskot aftan á rakstur og iløgur upp á 31 mió. kr, sum samanborið við framlagda uppskotinum gevur eitt samlað yvirskot upp á 49 mió. kr.

Hetta er at fegnast um, tí vit hava sum øllum kunnugt í avtalu við ríkisstjórnina handlið okkum til, at vit fingu yvirskot á fíggjarlógini í seinast lagi í 1998. Tíhetur hava ytri umstøðurnar, sum eitt nú náttúran við sínum økta fiskiríkidømi og harvið økta virksemi og m.a. eitt lægri rentustøði, gjørt alt lættari, so vit longu hava nátt hesum máli. Yvirskotið av landsins rakstri fyri 1997 sigst nú at verða 161 mió. kr.

Um hugt verður eftir, hvørjar orsøkir eru til betraðu gongdina í 1997, so sigur fíggjar- og búskapardeildin, at inntøkurnar í mun til tað, sum roknað varð við, tá fíggjarlógin varð løgd, eru knappliga 177 mió. kr. hægri. Hesar stava m.a. frá:

- rentur at gjalda eru 27 mió. kr. lægri
- vanligur landsskattur er 11 mió. kr. hægri
- avseting móti tapi er 8 mió. kr. lægri
- felagsskattur er 38 mió. kr. hægri
- punktgjøld eru 10 mió. kr. hægri
- skrásetingargjald er 16 mió. kr. hægri
- útluting frá Fíggingargrunninum er 68, 25 mió. kr. hægri

Síðan eru tað inntøkur, sum eru lægri enn væntað. Her er serliga vert at leggja til merkis, at inntøkurnar frá rentuskattinum og meirvirðisgjaldinum eru lægri.

Tá kannað verður eftir, hvørji viðurskiftir beinleiðis hava ávirkað til eina meira positiva gongd, so er hetta alt viðurskifir, sum eru komandi og farandi. Bæði Búskaparráðið og Landsbankin siga frá, at tað hevur verið ein vøkstur í okkara búskapi í 1997, men at tað er líkt til, at hesin vøksturin ikki verður í 1998. Víst verður á, at avreiðingar av toski eru minkandi,og kvoturnar í Barentshavinum eisini minka í 1998.

T.v.s. at áðrenn vit varnast, so kann henda positiva gongd venda ímóti okkum. Um fisksiskapurin fer niður

á tað vanliga støðið aftur, ella at rentustøðið hækkar, so eru knappliga okkara fíggjarligu útlit nøkur heilt onnur.

Ein skilagóður fíggjar- og búskaparpolitikkur er tí, at landskassin verður styrktur, t.v.s. at vit útvega honum møguleikar fyri at leggja til síðis. Hetta kann sum sagt bert gerast við, at hann ár um ár hevur yvirskot. Beint nú uppliva vit beint tað øvugta, har tað reður um so skjótt sum gjørligt at fáa brúkt eitt møguligt yvirskot.

Størsta hóttanin, okkara búskapur hevur, er tann ovurhonds stóra landskassaskuldin, sum í dag er um 6 mia. kr. Tað er sjálvsagt tit at fegnast um, at meirilutin mælir til, at 200 mió. kr. í komandi ári verða brúktar til avdrøg av hesi skuld, og verður henda upphædd tikin av gjaldføri landskassans, sum í løtuni er rættiliga gott, umt. 1 mia. kr.

Men tað má sigast at vera ein vandakós, sum meirilutin siglir, tá brúkt verður av gjaldføri landskassans, uttan at gjaldførið fær tilført nýggjan pening. Harvið taka vit av tí, sum vit eiga at brúka til at standa ímóti við, um eitthvørt hóttafall skuldi verið okkara samfelag fyri. Eisini verður sagt í yvirliti frá Landsbankanum, at gjaldføri landskassans í juli í ár var minni enn 700 mió. kr. meðan støðan í desembur er 1020 mió. kr. Minstakravið til innlán í Landsbankanum er sambært lóg 870 mió. kr., sum 15% av BTÚ. So betur enn gott er okkara gjaldføri heldur ikki, og tíverri er okkara búskapur so sárbarur, at vit skjótt tera burtur av gjaldførinum.

Um vit hava javnvág í rakstrinum av samfelagnum, so skulu vit rokna við eini gjaldførisfrágongd upp á 200 mió. kr.. Fíggjarárið 1997 kostar gjaldføri í 1998. Nettogjaldførið fer í fyrsta ársfjórðingi í 1998 at minka við 200 mió. kr., taka vit so avdrøgina aftrat, so er gjaldførið niðri á umt. 600 mió. kr.

Ein skilagóður fíggjar- og búskaparpolitikkur hevði tí verið, at tað, sum verður tikið út úr gjaldføri landskassans, verður afturført við nøkunlunda somu upphædd, stavandi frá einum yvirskoti av landkassans rakstri.

Bert ein varislig rentuhækking, sum vit jú ikki eru harrar yvir, kostar bæði tí almenna og privata húsarhaldunum stórar upphæddir. Ein hækking upp á eitt prosent kostar landskassanum um 60 mió. kr í meirrentu. So her liggur sanniliga eisini ein tikkandi bumba undir okkara búskapi.

Meirilutin skjýtur nú upp, at vit aftur fara at gera brúk av almennum grunnum til samansparingar til íløguendamál. Tað er løgið at hugsa sær, at í 1992 var tað táverandi formaður Fólkafloksins sum gjørdi seg til talsmann fyri avtøku av landskassagrunnunum, og nú er tað júst sami flokkur, sum ger seg til talsmann til at endurstovna somu grunnar. So seint sum í seinastu tingsetu viðgjørdi løgtingið uppskot frá landsstýrinum um avtøku av grunnum, og nú fara vit at viðgera uppskot um at endurstovna somu grunnar aftur. Tað verður av fakfólki mett, at rættast er, at alt virksemi landskassans framgongur av fíggjarlógini.

Men tað er sjálvsagt eyðsýnt fyri minnilutan, at endamálið við júst hesum grunni um fasta sambandið um Vestmannasund er at kyrra tey samgongufólk, sum hava roynt at sett knyklar í brýr seinastu tíðina. Samstundis hevur tað eyðsýniliga eisini eydnast at kyrra tey ivasomu við at siga, at treytin fyri at nakað verður gjørt, er, at lóggáva um nýtslu burtur úr grunninum er samtykt. Hesa lóggávu umsitur nú løgmaður, og vit mugu ganga út frá, at tað verður seinur dagur, áðrenn hann fer at leggja uppskot fyri tingið, sum heimilar nýtslu av pengum úr grunni til hetta endamál. Høvuðsatvoldin til, at ein landsstýrismaður fekk sekkin, var júst ætlanin, sum samgongan nú mælir til.

Men tað má standa vágafólki greitt, at tað verða júst tey, sum verða við sviðið soð í hesum politiska glantrileiki. Líkt er til, at vágatingmenninir ikki hava fatað tað enn.

Um tað veruliga er ein politisk ætlan at fara undir hetta arbeiðið, so eigur Føroya Løgting at sleppa at taka støðu til sjálvt málið, um byggjast skal ella ikki. Síðan skulu pengar sjálvsagt setast av á fíggjarlógini, uttan at nakar grunnur verður settur á stovn. So vágafólk mugu uttan iva enn einaferð brynja seg við toli, til ein komandi samgonga vísir rættiligt dirvi til at fara undir hetta stórarbeiðið.

Fíggjarlógaruppskot meirilutans hevur eitt yvirskot upp á 49 mió. kr. Men í løtuni liggja til viðgerðar í tingnum nøkur mál, sum fara at gera, at landskassin fer at missa nógvar milliónir í inntøkum. Her verður hugsað um skattalættan til fiskimenn, sum kostar landskassanum smáar 30 mió. kr. og síðan eitt uppskot um broyting av mvg-lógini, sum lættliga fer at kosta so nakið, at hetta yvirskotið upp á 49 mió. kr. longu fyri nýggjár er vent til eitt hall.

Men hóast hesi uppskot verða samtykt beint eftir ella møguliga sama dag sum fíggjarlógin, so verður ikki eitt orð gratt um hesa stóru útgjaring úr landskassanum, sum beinleiðis broytir munandi um fíggjarligu fortreytirnar hjá tí almenna.

V.ø.o. er hetta fíggjarlógaruppskot ein fjaldur leikur fyri tí, ið koma skal. Útgjaringin, sum kemur í kjalarvørrinum av fíggjarlógini, kostar ríkiliga tað yvirskot, sum henda lógin hevur.

Uttan at fara nærri inn á hesi mál, so vil minnilutin hóast alt gera vart við, at øll serfrøðingatilmæli hesum viðvíkjandi mæla frá slíkum fíggjarpolitikki. Bæði okkara egna Búskaparráð, Landsbankin og Ráðgevandi Nevndin mæla til, at ríkin verður ein strammur fíggjarpolitikkur, og at landsstýrið nú ikki gevur leyst fyri øllum tí trýsti, sum altíð vil vera á landskassan, tá hesin hevur yvirskot.

Eitt, sum politikkarar í 80'unum verða hartaðir fyri, er, at teir ikki tóku ráðini frá serfrøðingunum nóg nógv til eftirtektar. Men í so máta er einki broytt, tí øll serfrøðingatilmæli verða í hesum døgum kveistrað til viks.

Vert er eisini at nevna, at landsbankastjórin beinleiðis segði á fundi í fíggjarnevndini, at okkara fíggjarpolitikkur í løtuni er alt ov slakur.

Líkt er til, at sjúkrahúsini hava kostað meirilutanum størstu høvuðbryggini í sambandi við ta semju, sum nú er gjørd. Klaksvíkar Sjúkrahús og Landssjúkrahúsið hava strongt á at fáa eina meirjáttan. Semjan roynir so at býta sól og vind eins, men tað verður ongastaðni boðað frá, hví upphæddirnar eita 1,2 mió. kr. til Klaksvíkar Sjúkrahús og 5 mió. kr. til Landssjúkrahúsið og 800 tús. kr. til Suðuroyar Sjúkrahús.

Hvør er fakliga metingin aftan fyri júst hesar upphæddir? Hvar er tørvskanningin fyri meirjáttan, sum greidliga vísir, hvussu nógv hvørt sjúkrahús hevur fyri neyðuni? Hvar eru treytirnar, sum sjálvsagt áttu at verið settar í samband við hesar meirjáttanir? Eru raðfestingarnar á eitt nú Klaksvíkar Sjúkrahúsi og Landssjúkrahúsinum tær røttu? Átti ikki ein partur av meirjáttanini til Landssjúkrahúsið at verið markaður til psykiatrisku deild?

Uppskot meirilutans minnir ikki sørt um, tá foreldur býta lummapengar út til børnini. Tey stóru fáa eitt sindur meira enn tey smáu.

Hóast Javnaðarflokkurin er samdur í, at ein meirjáttan avgjørd er neyðug, so vilja vit mæla landsstýrismanninum til, at gjørd verður ein ætlan fyri nýtsluna av hesum upphæddum, soleiðis at tær koma til tað virksemi, sum hevur játtanina fyri neyðini.

Hetta er politisk semja verður sagt. Men tað er eingin náttúrulóg, sum forðar fyri, at eisini politiskar semjur kunnu gerast við eitt sindur av skili.

Sum nýggja játtan mælir Javnaðarflokkurin til, at ein upphædd verður sett til at útlíkna kostnaðarmunin, sum er at búgva á útoyggj í mun til tær støru oyggjarnar. Hetta er galdandi bæði fyri flutning av teimum fasthúgvandi og tí farmi, tey skulu hava, sum eitt nú olja. Tær oyggjar, her verður hugsað um, eru Fugloy, Svínoy, Mykines og Skúvoy.

Javnaðarflokkurin tekur undir við meirilutanum, tá hann mælir til, at pensiónsskipanin ikki verður broytt og hækkar fólkapensiónina við 12 mió. kr.

Hin vegin harmast vit, at landsstýrismaðurin í fiskivinnumálum enn onga greiða støðu hevur tikið til nýtsluna av teimum 40 mió. kr., sum settir eru av til nýggja lóggávu. Javnaðarflokkurin heitir tí á landsstýrismannin skjótast gjørligt at koma í tingið við einum uppskoti hesum viðvíkjandi.

Uppskot Javnaðarfloksins kosta 14 mió. kr., og við teimum nýggju inntøkumetingunum, sum meirilutin roknar við upp á 53 mió. kr og við teimum 18 mió. kr. í yvirskoti, sum upprunaliga uppskotið hevði, so verður endaliga úrslitið 57 mió. kr. í yvirskoti.

Ein av orsøkunum til at Javnaðarflokkurin tók seg burtur úr samgonguni á sumri í 1996 var, at vit ikki kundu taka undir við bygnaðarbroytingunum, m.a. tí at tær fóru at føra so nógvar eykaútreiðslur við sær, at vit ikki fóru at hava ráð til slíka umsiting, um eitt nú nøkur rakár komu í okkara fiskiskapi.

Fólkaflokkurin, sum stórt sæð hevur halgað sítt politiska lív til tess at berjast ímóti einum ov stórum almennum yvirbygnaði, og hetta mangan av órøttum, hevur nú bitið høvdið av allari skomm. Meðan teir hava umsitið fíggjarmál, er kostnaðurin til sjálvan raksturin av miðfyrisitingini fleirfaldaður, og starvsfólkatalið er farið úr 43,5 í 1994 til 82,25 í 1998.

Fyrst í 90'unum kostaði landsumsitingin nitnni enn løgmansskrivstovan einsamøll kostar í dag. Til tess at geva eina fatan av, hvussu henda umsiting er vaksin, so kostar løgmansskrivstovan tað sama, sum raksturin av Eysturoyar Studentaskúla og HF-skeiði og Klaksvíkar HF-skeiði kosta tilsamans.

Harumframt kostar tað stórar upphæddir til at flyta ymisku stýrini út úr Tinganesi.

Nú tað frættist, at Tjóðveldisflokkurin tekur undir við meirilutanum, kunnu føroyingar fáa eina hóming av, hvat ið teirra loysing m.a. kann føra til.

Í 1994 legði núsitandi landsstýrismaður í fíggjarmálum fram sítt egna uppskot til fíggjarlóg sum minniluti í fíggjarnevndini. Tað uppskotið var eitt uppskot eftir tí røttu fólkafloksreceptini og javnvigaði við umt. 1,9 mia. kr. Tí kundi ein væntað, at nú sami maður situr við ábyrgd, so fór okkurt at benda, men javnvágin er nú farin upp um 3 mia. kr. Uppskotið hjá fólkafloksminnilutanum í 1994 var sjálvsagt púrasta hurtursvið. Men minnilutin tykir, at fyriliggjandi uppskot frá meirilutanum er farið við beinari kós í mótsatta grøv.

Samstundis mugu vit ásanna, at øll fíggjarlig ábyrgdarkensla hjá Sambandsflokkinum eisini er fokin sama veg, sum tann fíggjarliga ábyrgdakensla, sum Fólkaflokkurin ongantíð hevur átt.

Broytingaruppskot
minnilutans til uppskot landsstýrisins

Innihald

§ 4. Mentan og samskifti o.a. **97**
4.38.1. Vegir og Havnir 97
1-10. Uppskot til eykajáttanarlóg fyri mars 1998

Ár 1998 hósdagin 5. mars, legði Anfinn Kallsberg, landsstýrismaður, vegna landsstýrið fram soljóðandi

Uppskot
til
eykajáttanarlóg fyri mars 1998

Innihald

Almennar viðmerkingar **218**
§ 3. Fíggjarmál o.a. **219**
3.15.1. Fíggjarfyrisiting v.m. 219
3.15.1.02. Kommunalar skattakærunevndir (Rakstrarjáttan) Nýggj høvuðskonto 219
§ 6. Vinnumál o.a. **220**
6.37.2. Ymiskir studningar 220
6.37.2.13. Kappingarlagandi tiltøk 220
§ 8. Heilsumál og almannamál o.a. **220**
8.20.2. Heilsutænastur 221
8.20.2.01. Sjúkrakassar 221
8.21.6. Eldri og brekað 221
8.21.6.04 Røkt av eldri (Rakstrarjáttan) 221
8.21.9. Dagstovnar 221
8.21.9.01. Dagstovnar 221
8.22.1. Ymiskar útreiðslur 221
8.22.1.05. Íbúðargrunnurin, stovnsfæ Nýggj høvuðskonto 221
8.22.1.10. Lánsafturgjald Nýggj høvuðskonto 221

Almennar viðmerkingar

Hjálagt er fyrsta eykajáttanarlóg sum løgd verður fyri tingið fyri fíggjárárið 1998. Landsstýrið hevur havt tað útgangsstøði, at miðvist skal ímóti, at allar eykajáttanir skulu vera útreiðsluneutralar.

Høvuðsyvirlit

Eykajáttan mars

Túsund kr.		Rakstrarætlan Útreiðslur	Rakstrarætlan Inntøkur	Løguætlan
§ 1.	**Løgtingið**	-	-	-
§ 2.	**Løgmansfyrisiting v.m.**	-	-	-
§ 3.	**Fíggjarmál o.a.**	-	-	-
§ 4.	**Mentan og samskifti o.a.**	-	-	-
§ 5.	**Fiskivinna**	-		-
§ 6.	**Vinnumál**	-	-	-
§ 7.	**Útbúgving og gransking**	-	-	-
§ 8.	**Almanna- og heilsumál o.a.**	10.000	10.000	-
Tilsamans		10.000	10.000	-
§ 20.	50. Rentur o.a.	-	-	
§ 20.	52. Skattir og avgjøld	-	-	
§ 20.	54. Ríkisstuðul	-	-	
Tilsamans		10.000	10.000	-

	Útreiðslur	Inntøkur	Yvirskot
Rakstrar-, løgu- og útlánsætlan RLÚ	10.000	10.000	-

§ 3. Fíggjarmál o.a.

A. Yvirlit

Játtanaryvirlit

Túsund kr.	Nettotal	Útreiðslur	Inntøkur
Útreiðsluætlan	-	-	-
Inntøkuætlan	-	-	-
Løguætlan	-	-	-
Fíggjarmál		-	-
3.15.1. Fíggjarfyrisiting v.m.		-	-

B. Játtanir

			Útreiðslur	Inntøkur
			tús. kr.	
3.15.1.	**Fíggjarfyrisiting v.m.**			
3.15.1.02.	Kommunonalar skattakærunevndir (Rakstraráttan)	J	-	-
	Nýggj høvuðskonto	EYJ	-	-

Viðmerkingar

3.15.1. Fíggjarfyrisiting v.m.

3.15.1.02. Kommunalar skattakærunevndir (Rakstrarjáttan) Nýggj høvuðskonto

Sambært § 12 í løgtingslóg nr. 169 frá 30. desember 1997 um Toll- og Skattafyrisiting verður landið býtt upp í 7 skattakæruøkir, har kommununar í økinum velja hvør sína skattakærunevnd til at viðgera kærur um álíkningina frá borgarunum í tí øki, tær umfata.

Sundurgreinað ætlan			
tús. kr.	**J**	**EYJ**	**J+EYJ**
Nettoútreiðslujáttan	-	-	-
Útreiðslur	-	500	500
Inntøkur	-	500	500
20. Vanligt virksemi			
Útreiðslur	-	500	500
11. Lønir o.a.	-	300	300
14. Keyp av vørum og tænastum	-	160	160
75. Skráseting av keyps-MVG		40	40
Inntøkur	-	500	500
77. Flyting frá kommunum	-	500	500

§ 6. Vinnumál o.a.

A. Yvirlit

Játtanaryvirlit

Túsund kr.	Nettotal	Útreiðslur	Inntøkur
Útreiðsluætlan	-	-	-
Inntøkuætlan	-	-	-
Løguætlan	-	-	-
Handil og vinna aunars		-	-
6.37.2. Ymiskir studningar		-	-

B. Játtanir

			Útreiðslur	Inntøkur
			tús. kr.	
6.37.2.	**Ymiskir studningar**			
6.37.2.13.	Kappingarlagandi tiltøk	J	5.000	-
		EYJ	-	-

C. Átekning

Nr. 3. ad. 6.37.2.13.
Í átekningini verður 14 oyru/kWh broytt til 12,3 oyru/kWh.

Viðmerkingar

6.37.2. Ymiskir studningar

6.37.2.13. Kappingarlagandi tiltøk
Verandi viðmerkingar verða strikaðar. Nýggjar viðmerkingar verða:

Endamálið við játtanini er, sambært avtalu millum landsstýrið og SEV frá 1995, at lækka el-prísin hjá vinnufyritøkum. Avtalan verður endurskoðað hvørt ár. Stuðulin verður veittur úr landskassanum sum ein avsláttur í streymprísinum hjá el-innleggingum sum koma undir vinnuprísskipanina hjá SEV. Í 1995 og 1996, var avslátturin 14 oyru/kwh, í 1997 12,3 oyru/kwh og verður avslátturin í 1998, tann sami sum í 1997.

Sundurgreinað ætlan

tús. kr.	J	EYJ	J+EYJ
Útreiðslujáttan	5.000	-	5.000

01. Stuðul

Útreiðslur	**5.000**	**-**	**5.000**
53. Stuðul til vinnur	5.000	-	5.000

§ 8. Heilsumál og almannamál o.a.

A. Yvirlit

Játtanaryvirlit

Túsund kr.	Nettotal	Útreiðslur	Inntøkur
Útreiðsluætlan	10.000	10.000	

Inntøkuætlan	10.000	-	10.000
Løguætlan	-	-	-

Heilsumál		**-1.000**	**-**
8.20.2. Heilsutænastur		-1.000	-
Almannamál		**1.000**	**-**
8.21.6. Eldri og brekað		-450	-
8.21.9. Dagstovnar		1.450	-
Íbúðarmál		**10.000**	**10.000**
8.22.1. Ymiskar útreiðslur		10.000	10.000

B. Játtanir

			Útreiðslur	Inntøkur tús. kr.
8.20.2.	**Heilsutænastur**			
8.20.2.01.	Sjúkrakassar	J	16.430	-
		EYJ	**-1.000**	
8.21.6.	**Eldri og brekað**			
8.21.6.04.	Røkt av eldri (Rakstrarjáttan)	J	147.790	-
		EYJ	**-450**	-
8.21.9.	**Dagstovnar**			
8.21.9.01.	Dagstovnar	J	49.630	-
		EYJ	**1.450**	**-**
8.22.1.	**Ymiskar útreiðslur**			
8.21.1.05.	Íbúðargrunnurin, stovnsfæ Nýggj høvuðskonto	J	-	-
		EYJ	**10.000**	-
8.22.1.10.	Lánsafturgjald Nýggj høvuðskonto	J	-	-
		EYJ	**-**	**10.000**

Viðmerkingar

8.20.2. Heilsutænastur

8.20.2.01. Sjúkrakassar

Í løgtingslóg nr. 176 frá 30. desember 1997 um broyting í løgtingslóg um meirvirðisgjald, verður reseptskyldugur heilivágur til fólk undantikin meirvirðisgjald.

Landskassin endurrindar Sjúkrakassunum 24% av útreiðslunum til reseptskyldugan heilivág til fólk. Lógarbroytingin fer væntandi at geva Sjúkrakassunum eina minni útreiðslu uppá 1,5 mió. kr. Skotið verður upp, at landskassin brúkar _ mió. kr. til at hækka endurgjaldsprosentið. Roknað verður við, at endurgjaldsprosentið kann hækkast við umleið tveimum stigum fyri _ mió. kr, soleiðis at endurgjaldsprosentið verður 26% í 1998.

Sundurgreinað ætlan

tús. kr.	**J**	**EYJ**	**J+EYJ**
Útreiðslujáttan	16.430	-1.000	15.430

01. Stuðul

Útreiðslur	**16.430**	**-1.000**	**15.430**
52. Tilskot til einstaklingar	16.430	-1.000	15.430

8.21.6. Eldri og brekað

8.21.6.04 Røkt av eldri, (Rakstrarjáttan)
Rakstur og rentur og avdráttir verða minni á undirkonto 21: »Vistarheim fyri pensiónistar«. Kapasiteturin á Vistarheiminum er ikki nýttur til fulnar.

Sundurgreinað ætlan

tús. kr.	J	EYJ	J+EYJ
Nettoútreiðslujáttan	147.790	-450	147.340
Útreiðslur	174.134	-483	173.651
Inntøkur	26.344	-33	26.311

20. Røktarheim

Útreiðslur	**88.490**	**-**	**88.490**
11. Lønir o.a.	72.129	-	72.129
14. Keyp av vørum og tænastum	11.254	-	11.254
15. Keyp av útbúnaði, netto	516	-	516
16. Leiga, viðlíkahald og skattir	1.069	-	1.069
19. Ymsar rakstrarútreiðslur	614	-	614
55. Rentur & avdráttir	115	-	115
71. Innanhýsis flytingar	345	-	345
75. Skráseting av keyps-MVG	2.448	-	2.448
Inntøkur	**18.907**	**-**	**18.907**
21. Søla av vørum og tænastuveitingum	1.298	-	1.298
77. Flytingar frá kommunum	17.609	-	17.609

21. Vistarheim fyri pensiónistar

Útreiðslur	**5.723**	**-483**	**5.240**
11. Lønir o.a.	3.669	**-383**	3.286
14. Keyp av vørum og tænastum	696	-	696
15. Keyp av útbúnaði, netto	60	-	60
16. Leiga, viðlíkahald og skattir	140	-	140
54. Stuðul til annað virksemi	51	-	51
55. Rentur & avdráttir	900	**-100**	800
75. Skráseting av keyps-MVG	207	-	207
Inntøkur	**386**	**-33**	**353**
76. Flytingar frá kommunum	386	33	353

22. Heimarøktin

Útreiðslur	**62.318**	**-**	**62.318**
11. Lønir o.a.	58.409	-	58.409
14. Keyp av vørum og tænastum	1.421	-	1.421
15. Keyp av útbúnaði, netto	62	-	62
16. Leiga, viðlíkahald og skattir	400		400
19. Ymsar rakstrarútreiðslur	1.726	-	1.726
75. Skráseting av keyps-MVG	300	-	300

Inntøkur	**5.193**	**-**	**5.193**
21. Søla av vørum og tænastuveitingum	1.800	-	1.800
76. Flytingar frá kommunum	3.393	-	3.393

23. Heilsusystrar

Útreiðslur	**5.630**	**-**	**5.630**
11. Lønir o.a.	5.004	-	5.004
14. Keyp av vørum og tænastum	213	-	213
15. Keyp av útbúnaði, netto	20	-	20
16. Leiga, viðlíkahald og skattir	100	-	100
19. Ymsar rakstrarútreiðslur	240	-	240
75. Skráseting av keyps-MVG	53	-	53

24. Eldrarøkt í Sandoynni

Útreiðslur	**7.973**	**-**	**7.973**
11. Lønir o.a.	6.717	-	6.717
14. Keyp av vørum og tænastum	938	-	938
19. Ymsar rakstrarútreiðslur	153	-	153
75. Skráseting av keyps-MVG	165	-	165
Inntøkur	**1.588**	**-**	**1.588**
21. Søla av vørum og tænastuveitingum	878	-	878
76. Flytingar frá kommunum	710	-	710

25. Bústað til eldri

Útreiðslur	**4.000**	**-**	**4.000**
11. Lønir o.a.	3.200	-	3.200
14. Keyp av vørum og tænastum	640	-	640
75. Skráseting av keyps-MVG	160	-	160
Inntøkur	**270**		**270**
21. Søla av vørum og tænastuveitingum	-	-	-
76. Flytingar frá kommunum	270	-	270

8.21.9. Dagstovnar

8.21.9.01. Dagstovnar

Fleiri umsóknir, enn roknað var við, eru komnar frá kommunum um barnagonsing, aftaná uppskotið um fíggjarlógina fyri 1998 varð lagt fyri tingið. Vegna skeivar framrokningar í fíggjarætlanini fyri 1998 eru bara 230.000 kr. í játtanini til nýggj tiltøk/ vaksandi virksemi, og er hetta ikki nógmikið fyri at nøkta tørvin.

Sundurgreinað ætlan

tús. kr.	**J**	**EYJ**	**J+EYJ**
Útreiðslujáttan	49.630	1.450	51.080

01. Vanligt virksemi

Útreiðslur	**49.630**	**1.450**	**51.080**
34. Stuðul til annað virksemi	19.088		19.088
72. Flytingar til kommunur	30.542	1.450	31.992

8.22.1. Ymiskar útreiðslur

8.22.1.05. Íbúðargrunnurin, stovnsfæ Nýggj høvuðskonto

Í 1998 var ætlanin at játta Íbúðargrunninum stovnsfæ, men tá ið rammurnar vóru longar, varð hetta slept fyribils. Tó var ongin ivi um, at útvegast skuldi pengar til Íbúðargrunnin, soleiðis at grunnurin kundi fíggja nýggj tiltøk innan almanna íbúðarøki - millum annað eldrafbúðir, har tørvurin er stórur.

Húsalánsgrunnurin hevur skotið upp, at Húsalánsgrunnurin skal afturgjalda 10 mió. kr. av einum láni, sum grunnurin hevur fingið úr landskassanum, nú ístaðin fyri í ár 2000, sum avtalað varð. Landskassin hevur sostatt 10 mió. kr. tøkar til at játta Íbúðargrunninum, og verður hetta útreiðsluneutralt fyri landskassan.

Sundurgreinað ætlan **tús. kr.**	**J**	**EYJ**	**J+EYJ**
Útreiðslujáttan	-	**10.000**	10.000
01. Stuðul			
Útreiðslur	-	**10.000**	**10.000**
54. Stuðul til annað virksemi	-	**10.000**	10.000

8.22.1.10. Lánsafturgjald. Nýggj høvuðskonto

Í sambandi við at gera útlánspartin av RLÚ-roknskapinum greiðari er neyðugt at greina lánini á høvuðs og undirkonti. Húsalánsgrunnurin hevur fingið lán úr landskassanum, sum fellur til gjaldingar í ár 2000, men fer í ár at gjalda 10 mió. kr. av hesum láni aftur.

Sundurgreinað ætlan **tús. kr.**	**J**	**EYJ**	**J+EYJ**
Útreiðslujáttan	-	**10.000**	10.000
01. Lánsafturgjald			
Inntøkur	-	**10.000**	**10.000**
86. Afturgjald av lánum	-	10.000	10.000

1. viðgerð miðvikudagin 18. mars 1998. Uppskotið varð beint í Fíggjarnevndina.

31. mars 1998 las formaðurin skriv frá 21 tingmonnum við áheitan um at viðgera uppskotið.

Hósdagin 2. apríl 1998 legði fíggjarnevndin fram soljóðandi

Álit

Málið er lagt fram av landsstýrinum 5. mars 1998 og eftir 1. viðgerð 18. mars 1998 beint í fíggjarnevndina.

Nevndin hevur viðgjørt málið á fundi tann 1. apríl, og mælir ein samd nevnd tingsins til at samtykkja uppskotið.

Sama dag var atkvøðugreiðsla um skriv frá 6 tingmonnum um at víkja frá tíðarfreistini millum framløgu av áliti og 2. viðgerð. Hetta varð samtykt við 15-2-0.

2. viðgerð fríggjadagin 3. apríl 1998. Uppskot landsstýrisins samtykt við 20-0-0. At uppskotið soleiðis samtykt kann fara til 3. viðgerð samtykt 20-0-0.

3. viðgerð leygardagin 4. apríl 1998. Uppskotið, sum samtykt við 2. viðgerð, endaliga samtykt 22-0-0.

L.l. nr. 43 frá 08.04.1998

1-11. Uppskot um Eykajáttanarlóg mars 1998 - 1

Ár 1998, hósdagin 5. mars, legði Vilhelm Johannesen, løgtingsmaður, vegna Javnaðarflokkin fram soljóðandi

Uppskot
um
eykajáttanarlóg fyri mars 1998 - 1

Almennar viðmerkingar

Javnaðarflokkurin hevur lagt fram á ting uppskot um broyting í dagpeningaskipanini, viðbót til ávísar pensionistar og lóg um endurgjald til Arbeiðsmarknaðareftirlønargrunnin, ávíkavist løgtingsmál nr. 114/1997: Løgtingslóg um broyting í lóg fyri Føroyar um dagpening vegna sjúku og barnsborð, løgtingsmál nr. 115/1997: Broyting í løgtingslóg um viðbót til ávísar pensionistar og løgtingsmál nr. 83/1997: Lóg um endurgjald til Arbeiðsmarknaðareftirlønargrunnin. Vist verður á viðmerkingarnar í hesum málum.

Kostnaðurin av broytingini av viðbótini til ávísar pensionistar verður mettur til 11,2 mió. kr., broytingin í dagpeningaskipanini er mett at kostar 1 mió. kr., og endurgjald til Arbeiðsmarknaðareftirlønargrunnin er sett til 30,2 mió. kr.

Fyriliggjandi uppskot til eykajáttanarlóg snýr seg um at játta peningaupphæddina, sum uppskotini hava við sær.

§ 8. Almanna- og heilsumál o.a.

A. Yvirlit

Játtanaryvirlit

Túsund kr.	**Nettotal**	**Útreiðslur**	**Inntøkur**
Útreiðsluætlan	42.400	42.400	-
Inntøkuætlan	-	-	-
Løguætlan	-	-	-
Amannamál		**12.200**	**-**
8.21.4. Dagpeningur		1.000	
8.21.8. Sosialar pensiónir		11.200	-
Arbeiðsmarknaður		**30.200**	**-**
Nýggj konto: Arbeiðsmarknaðareftirlønargrunnin		30.200	

B. Játtanir

			Útreiðslur	Inntøkur tús. kr.
8.21.4	**Dagpeningur**			
8.21.4.01.	Dagpeningaskipanin (Lógarb. játtan)	J	45.500	-
		EYJ	**1.500**	-
8.21.8.	**Sosialar pensiónir**			
8.21.8.13.	Viðbót til ávísar pensiónistar (Lógarb.játt)	J	12.200	-
		EYJ	**11.000**	-
8.39.1.	**Ymiskar útreiðslur**			
Nýggj konto. Arbeiðsmarknaðareftirlønargrunnurin		**J**	0	-
		EYJ	30.200	-

Viðmerkingar

8.21.4. Dagpeningur

8.21.4.01. Dagpeningaskipanin (lógarbundin játtan)
Játtanin verður hækkað vegna nýggja lóggávu.

Sundurgreinað ætlan

tús. kr.	**J**	**EYJ**	**J+EYJ**
Útreiðslur	45.500	1.500	47.000

01. Løntakarar

Útreiðslur	**41.515**	**1.350**	**42.865**
52. Tilskot til einstaklingar.	41.515	1.350	42.865

02. Sjálvstøðug og húshaldsfólk

Útreiðslur	**3.566**	**150**	**3.706**
52. Tilskot til einstaklingar.	3.556	150	3.706

8.21.8. Sosialar pensiónir

8.21.8.13. Viðbót til ávísar pensiónistar (lógarbundin játtan)
Játtanin verður hækkað vegna nýggja lóggávu.

Sundurgreinað ætlan

tús. kr.	**J**	**EYJ**	**J+EYJ**
Útreiðslur	12.200	11.000	23.200

01. Viðbót

Útreiðslur	**12.200**	**11.000**	**23.200**
52. Tilskot til einstaklingar.	12.200	11.000	23.200

8.39.1. Ymiskar útreiðslur

Nýggj konto. Arbeiðsmarknaðureftirlønargrunnurin
Endurgjald fyri mista inntøku frá 1. apríl 1993 til 31. mars 1994.

Sundurgreinað ætlan **tús. kr.**	**J**	**EYJ**	**J+EYJ**
Útreiðslur	0	30.200	30.200
01. Stuðul			
Útreiðslur	**0**	**30.200**	**30.200**
54. Stuðul til annað virksemi.	0	**30.200**	**30.200**

1. viðgerð týsdagin 17. mars 1998. Uppskotið verð beint í fíggjarnevndina.

Málið fall burtur sbr. stýrisskipanarlógini § 15 stk. 3, tí at løgtingsval var 30. apríl 1998, og málið ikki var liðugt viðgjørt á tingi fyri valið.

1-12. Uppskot um Eykajáttanarlóg mars 1998 - 2

Ár 1998, hósdagin 5. mars, legði Vilhelm Johannesen, løgtingsmaður, vegna sig sjálvan og Álv Zachariasen, løgtingsmann, fram soljóðandi

Uppskot
um
eykajáttanarlóg fyri mars 1998 - 2

Almennar viðmerkingar

Mælt verður til at játta 2,2 miliónir krónur til bústovnar undir serforsorgini. Mælt verður til, at peningurin verður nýttur til bústovnar í Norðoyggjum og í Vágunum, og er orsøkin til hetta tann, at tørvurin á slíkum bústovnum er serliga stórur í hesum báðum økjunum.

Ein slíkur bústovnur er í Suðuroy, eisini er ein í Eysturoy, og í Tórshavn eru eisini slíkir bústovnar. Tí verður mett, at rætt er at raðfesta Norðoyggjar og Vágarnar, tá talan er um at skipa nýggjar bústovnar undir serforsorgini.

§ 8. Heilsumál og almannamál o.a.

A. Yvirlit

Játtanaryvirlit Túsund kr.	Nettotal	Útreiðslur	Inntøkur
Útreiðsluætlan	-	-	-
Inntøkuætlan	-	-	-
Løguætlan	2.200	2.200	-
Almannamál		**2.200**	
8.21.6. Eldri og brekað		2.200	

B. Játtanir

			Útreiðslur	Inntøkur
			tús. kr.	
8.21.6.	**Eldri og brekað**			
8.21.6.02.	Bústovnur, serforsorg (Løgujáttan)	J	2.200	-
		EYJ	**2.200**	**-**

C. Átekning

Nr. 2. að 8.21.6.02. Játtanin verður hækkað við 2,2 mió. kr. og eigur at fara til bústovnar í Norðoyggjum og í Vágum.

Viðmerkingar

8.21.6. Eldri og brekað

8.21.6.02. Bústovnur, serforsorg (Løgujáttan)
Játtanin verður hækkað at nýta til bygging/keyp av húsum í Norðoyggjum og Vágum til búfólk innan serforsorgina.

Sundurgreinaðætlan			
tús. kr.	J	**EYJ**	**J+EYJ**
Útreiðslur	**2.000**	**2.200**	**4.200**

10. Bústovnur

Útreiðslur	**2.000**	**2.200**	**4.200**
31. Bygging og løgufrumleiðsla.	320	1.200	1.520
32. Útvegan av løgu.	1.600	750	2.350
75. Skráseting av keyps-MVG.	80	250	330

1. viðgerð mikudagin 18. mars 1998. Uppskotið beint í fíggjarnevndina.

1-13 Uppskot um Eykajáttanarlóg mars 1998 - 3

Ár 1998, hósdagin 5. mars, legði Jákup Joensen, løgtingsmaður, vegna sex sjálvan og løgtingsmenninar Suna Jacobsen, Jørgen Niclasen, Jóannes Eidesgaard, Henrik Old, Jógvan Durhuus, Ingeborg Vinther, Lassa Klein, Jenis av Rana og Karl Robert Johansen fram soljóðandi.

Uppskot
um
eykajáttanarlóg fyri mars 1998 - 3

Almennar viðmerkingar
Í tingmálinum nr. 133/1997: Løtingslóg um broyting um stuðul til fiskiskaflotan, verður mælt til, at meirútreiðslan til íløgustuðulin í fíggjarárinum 1998 kr. 14,4 mió., verður tikin av høvuðskonto 5.34.4.34. Nýggj lóggáva. Tí verður hetta uppskot lagt fram. Víst verður annars á viðmerkingarnar í tingmálinum nr. 133/1997: Løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um stuðul til fiskiskaflotan.

§ 8.Fiskivinna

A.Yvirlit

Játtanayvirlit

túsund kr.	Nettotal	Útreiðslur	Inntøkur
Útreiðsluætlan	-	-	-
Inntøkuætlan	-	-	-
Løguætlan	-	-	-

Málið fall burtur sbr. stýrisskipanarlógini § 15 stk. 3, tí at løgtingsval var 30. apríl 1998, og málið ikki var liðugt viðgjørt á tingi fyri valið.

Fiskivinna	-
5.34.4. Studningur til vinnur	-

B. Játtanir

			Útreiðslur	Inntøkur
			tús. kr.	
5.34.4.	**Studningur til vinnur**			
5.34.4.07.	Íløgustuðul (Lógarbundin játtan)	J	10.000	-
		EYJ	14.400	-
5.34.4.07.	Nýggj lóggáva (Lógarbundin játtan)	J	40.000	-
		EYJ	-14.400	-

Viðmerkingar

5.34.4. Studningur til vinnur

5.34.4.07. Íløgustuðul (Lógarbundin játtan)
Játtanin verður hækkað vegna broytta lóggávu.

Sundurgreinað ætlan

tús. kr.	J	EYJ	J+EYJ
Útreiðslur	**10.000**	**14.400**	**24.400**

01. Stuðul

Útreiðslur	10.000	14.400	24.400
53. Stuðul til vinnu	10.000	14.400	24.400

5.34.4.34. Nýggj lóggáva (Lógarbundin játtan)
Játtanin verður lækkað vegna broytta lóggávu.

Sundurgreinnð ætlan

tús. kr.	J	EYJ	J+EYJ
Útreiðslur	40.000	-14.400	25.600

01. Stuðul

Útreiðslur	**40.000**	**-14.400**	**25.600**
53. Stuðul til vinnu	40.000	-14.400	25.600

Málið fall burtur sbr. stýrisskipanarlógini § 15 stk. 3, tí at løgtingsval var 30. apríl 1998, og málið ikki var liðugt viðgjørt á tingi fyri valið.

1-14. Uppskot um Eykajáttanarlóg mars 1998 - 4

Ár 1998, hósdagin 5. mars, legði Henrik Old, løgtingsmaður, vegna seg sjálvan fram soljóðandi

Uppskot
um
eykajáttanarlóg fyri mars 1998 - 4

Almennar viðmerkingar
Í løgtingslógini um stuðul til menning av fiskivinnuni á landi er landsstýrismanninum heimilað at veita fiskavirkjum stuðul til tiltøk, ið eru neyðug fyri, at hesi fiskavirki kunnu lúka krøv viðvíkjandi menning í sambond við løggilding og innaneftirlit, ið eru og verða ásett av Heilsufrøðiligu Starvsstovuni. Flakavirkini í Vági (Polarfrost) og í Nólsoy eru ikki í gongd í løtuni. Til tess at tryggja, at møguleiki kann verða at seta virkini í gongd aftur í ár, verður mælt til at játta upp til 1.7 mió. kr. til flakavirkið í Vági (Polarfrost) og upp til 0,5 mió. kr. til flakavirkið í Nólsoy sum stuðul til menning av virkjunum, so tey lúka krøvini frá Heilsufrøðiligu Starvsstovuni um løggilding og innaneftirlit.

§ 8. Fiskivinna

A. Yvirlit

Játtanaryvirlit

Túsund kr.	**Nettotal**	**Útreiðslur**	**Inntøkur**
Útreiðsluætlan	2.200	2.200	-
Inntøkuætlan	-	-	-
Løguætlan	-	-	-
Fiskivinna		**2.200**	
5.34.4. Studningur til vinnur		2.200	

B. Játtanir

			Útreiðslur	**Inntøkur**
			tús. kr.	
5.34.4.	Studningur til vinnur			
5.34.4.16.	Fiskivinnumenning á landi	J	12.000	-
		EYJ	2.200	-

C. Átekning

Ad. 5.34.4.16.
Landsstýrinum verður heimilað, sambert løgtingslóg nr. 84 frá 28. mai 1996 um stuðul til at menna fiskivinnuna á landi við seinni broytingum, at gjalda upp til 1,7 mió kr. til flakavirkið í Vági (Polarfrost) og upp til 0,5 mió. kr. til flakavirkið í Nólsoy sum stuðul til menning av virkjunum, so tey lúka krøvini frá Heilsufrøðiligu Starvsstovuni um løggilding og innaneftirlit.

Viðmerkingar

5.34.4. Studningur til vinnur
5.34.4.16. Fiskivinnumenning á land
Játtanin verður hækkað við 2,2 mió. kr. til menning av innaneftirliti upp til 1,7 mió kr. til flakavirkið í Vági (Polarfrost) og upp til 0,5 mió. kr. til flakavirkið í Nólsoy.

Sundurgreinað ætlan

tús. kr.	**J**	**EYJ**	**J+EYJ**
Útreiðslur	12.000	2.200	14.200
01. Stuðul			
Útreiðslur	**12.000**	**2.200**	**14.200**
53. Stuðul til vinnu	12.000	2.200	14.200

1. viðgerð mikudagin 18. mars 1998. Áðrenn orðaskiftið við 1. viðgerð var liðugt, fekk løgmaður orðið til serliga fráboðan sambært § 51, stk. 3 í tingskipanini og boðaði frá nýggjum 30. apríl 1998.

Málið fall burtur sbr. stýrisskipanarlógini § 15 stk. 3, tí at løgtingsval var 30. apríl 1998, og málið ikki var liðugt viðgjørt á tingi fyri valið.

1 - 15. Ikki brúkt

1-16. Uppskot um eykajáttanarlóg mars 1998 - 6

Ár 1998, týsdagin 31. mars, las formaðurin skriv, dagfest 27. mars 1998, frá 20 tingmonnum, har hesir sambært § 54, stk. 2, í tingskipanini viðmæla, at uppskotið kann leggjast fyri tingið, og legði Anfinn Kallsberg, landsstýrismaður, sostatt vegna landsstýrið fram soljóðandi

Uppskot
til
eykajáttanarlóg fyri mars 1998 - 6

Innihald

Almennar viðmerkingar 233
§ 4. Mentan og samskifti o.a. 233
4.38.1.14. Havnir *(Løgsjáttan)* 233
4.38.2. Samferðsla 233
4.38.2.01. Strandferðaskip Landsins *(Landsfyritøka)* 233
4.38.2.02. Strandferðaskip Landsins *(Løgsjáttan)* 233
4.38.3. Samskifti 233
4.38.3.06. Umlegging av Telefonverk Føroya Løgtings til partafelag *Nýggj heimasíða* 233

Almennar viðmerkingar

Hjálagt verður send eykajáttanarlóg fyri mars. Landsstýrið hevur sum útgangsstøði havt tann útreiðslupolitikk, at eykajáttanir skulu hava tilsvarandi sparingar við sær, soleiðis at játtanin verður útreiðsluneutral.

Høvuðsyvirlit

Eykajáttan mars

Túsund kr.		Rakstrarætlan Útreiðslur	Rakstrarætlan Inntøkur	Løgu-ætlan
§ 1.	**Løgtingið**	-	-	
§ 2.	**Løgmansfyrisiting v.m.**	-	-	-
§ 3.	**Fíggjarmál o.a.**	-	-	-
§ 4.	**Mentan og samskifti o.a.**	**242.941**	**241.241**	**-1.700**
	11. Felagsútreiðslur	-	-	-
	24. Mentan	-	-	-
	35. Sjóvinna	-	-	-
	38. Samferðsla og samskifti	*242.941*	*241.241*	*-1.700*
§ 5.	**Fiskivinna**	-		-
§ 6.	**Vinnumál**	-	-	-
	11. Felagsútreiðslur	-	-	-
	33. Landbúnaður	-	-	-
	36. Áling	-	-	-
	37. Handil og vinna annars	-	-	-
§ 7.	**Útbúgving og gransking**	-	-	-
	11. Felagsútreiðslur	-	-	-
	23. Útbúgving og gransking	-	-	-
	30. Umhvørvi	-	-	-
§ 8.	**Almanna- og heilsumál o.a.**	-	-	-
	11. Felagsútreiðslur	-	-	-
	20. Heilsumál	-	-	-
	21. Almannamál	-	-	-
	22. Íbúðarmál	-	-	-
	39. Arbeiðsmarknaður	-	-	-
Tilsamans		**242.941**	**241.241**	**-1.700**
§ 20.	50. Rentur o.a.	-	-	
§ 20.	52. Skattir og avgjøld	-	-	
§ 20.	54. Ríkisstuðul	-	-	
Tilsamans		242.941	241.241	-1.700

	Útreiðslur	Inntøkur	Yvirskot
Raksttar-, løgu- og útlánsætlan RLÚ	**241.241**	**241.241**	**-**

Uppskot
til
eykajáttanarlóg fyri mars 1998 - 6

Innihald

Almennar viðmerkingar 1
§ 4. Mentan og samskifti o.a. 2
4.38.1.14. Havnir (Løgujáttan) 3
4.38.2. Samferðsla 3

4.38.2.01. Strandfaraskip Landsins (Landsfyritøka) 3
4.38.2.02. Strandfaraskip Landsins (Løgujáttan) 4
4.38.3. Samskifti 5
4.38.3.06. Umlegging av Telefonverk Føroya Løgtings til partafelag Nýggj høvuðskonto 5

Almennar viðmerkingar

Hjálagt verður send eykajáttanarlóg fyri mars. Landsstýrið hevur sum útgangsstøði havt tann útreiðshupolitikk, at eykajáttanir skulu hava tilsvarandi sparingar við sær, soleiðis at játtanin verður útreiðsluneutral.

§ 4. Mentan og samskifti o.a.

A. Yvirlit

Játtanaryvirlit

Túsund kr.	**Nettotal**	**Útreiðslur**	**Inntøkur**
Útreiðsluætlan	242.941	242.941	-
Inntøkuætlan	241.241	-	241.241
Løguætlan	-1.700	-1.700	-
Samferðsla og samskifti		**241.241**	**241.241**
4.38.1. Havnir		3.000	
4.38.2. Samferðsla		-3.000	
4.38.3. Samskifti		241.241	241.241

B. Játtanir

			Útreiðslur	**Inntøkur**
			tús. kr.	
4.38.1.	**Vegir og havnir**			
4.38.1.14.	Havnir (Løgujáttan)	J	11.500	
		EYJ	**3.000**	
4.38.2.	**Samferðsla**			
4.38.2.01.	Strandfaraskip Landsins (Landsfyritøka)	J	43.800	
		EYJ	**1.700**	
4.38.2.02.	Strandfaraskip Landsins (Løgujáttan)	J	6.000	
		EYJ	**-4.700**	
4.38.3.	**Samskifti**			
4.38.3.06.	Umlegging av Telefonverk Føroya Løgtings til partafelag **Nýggj høvuðskonto**	J **EYJ**	- **241.241**	- **241.241**

Viðmerkingar

4.38.1.14. Havnir (Løgujáttan)

Fyri at bøta um umstøðurnar hjá Búgvuni at sigla inn á Leirvík alt árið, eru 2,0 mió. kr. játtaðar til at dýpa ein part av havnalagnum í Leirvík. Játtanin nøkkur tó bert til at gera eina rás, sum skipið kann sigla eftir inn á havnina. Landsverkfrøðingurin metir, at av trygdarávum er neyðugt at dýpa størri part av havnalagnum, soleiðis at vandi ikki verður fyri, at skipið tekur í botn.

Játtanin verður hækkað við 3,0 mió. kr. til hetta endamál.

Sundurgreinað ætlan:

tús. kr.	J	EYJ	J+EYJ
Útreiðslujáttan	11.500	**3.000**	14.500

10. Nýgerð av havnum

Útreiðslur	**11.500**	**3.000**	**14.500**
31. Bygging og løgufamleiðsla	9.100	**2.400**	11.500
75. Skráseting av keyp MVG	2.400	**600**	3.00

Virkseinisyvirlit

	J	EYJ	J+EYJ
A: Høvuðsendamál (1.000 kr.)	**11.500**	**3.000**	**14.500**
1. Skopunar havn	7.000	-	7.000
2. Ferjulega í Klaksvík	-	-	-
3. Oyrargjógv	2.500	-	2.500
4. Leirvík	2.000	**3.000**	5.000

4.38.2. Samferðsla.

4.38.2.01. Strandfaruskip Landsins. (Landsfyritøku)

Smyril skal í ár til høvuðseftirlit og ætlaði Strandferðslan at seta Dúgvuna inn fyri Smyril hetta tíðarskeið. Hildið verður at Dúgvan ikki er nóg væl hóskandi til at røkja suðuroyarfarleiðina, og er tí ynskt um heldur at leiga Norrønu til endamálið, men hevur hetta ein meirkostnað við sær uppá 1,7 mió. kr., og verður játtan stovnsins tískil hækkað samsvarandi.

Uppgerð av nettotølum

tús. kr.	J	EYJ	J+EYJ
Inntøkur	**67.600**	**-**	**67.600**
Felags fyrisiting	500	-	500
Oyggjaleiðir	38.400	-	38.400
Bygdaleiðir	20.000	-	20.000
Farmaflutningur á landi	8.700	-	8.700
Uttanlandaflutningur	-	-	-
Játtan	**43.800**	**1.700**	**45.500**
Útreiðslur	**111.400**	**1.700**	**113.100**
Felags fyrisiting	15.200	-	15.200
Oyggjaleiðir	58.300	1.700	60.000
Bygdaleiðir	25.000	-	25.000
Farmaflutningur á landi	12.900	-	12.900
Uttanlandaflutningur	-	-	-
Renlur og avskrivingar	**-**	**-**	**-**
Nettotal	**0**	**0**	**0**

Sundurgreinað ætlan

tús. kr.	**J**	**EYJ**	**J+EYJ**
Nettoútreiðslujáttan	43.800	**1.700**	45.500

Útreiðslur	111.400	1.700	113.100
Inntøkur	67.600	-	67.600

20. Vanligt virksemi

Útreiðslur	111.400	1.700	113.100
11. Lønir o.a.	44.300	100	44.400
Annað (bert '96)	-	-	
14. Keyp av vørum og tænastum	47.900	-	47.900
15. Keyp av útbúnaði, netto	1.000	100	1.100
16. Leiga, viðlíkahald og skattir	17.700	1.500	19.200
32. Útvegan av anleggi	500	-	500
Inntøkur	67.600	-	67.600
21. Søla av vørum og tænastuveitingum	67.600	-	67.600

4.38.2.02. Strandfaraskip Landsins. (Løgujáttan)

Ætlanin at umbyggja og leingja Másan verður av ongum, tí at Skipaeftirlitið loyvir ikki hesum, men verða í staðin neyðugar ábøtur gjørdar. Útreiðslurnar til hetta endamál verða hildnar innanfyri rakstrarkarm stovnsins fyri 1998. Játtanin verður tí lækkað við 4.700 tkr., og verða tær 300 tkr., sum eru eftir, nýttar til kanningar av rutusiglingini til Eysturoyar og Svínoyar.

Sundurgreinað ætlan: **tús. kr.**	**J**	**EYJ**	**J+EYJ**
Útreiðslujáttan	6.000	**-4.700**	1.300

01. Sandoyarskip

Útreiðslur	**1.000**	-	1.000
31. Bygging og løguframeiðsla	1.000	-	1.000

02. Másin

Útreiðslur	**5.000**	**-4.700**	**300**
31. Bygging og løguframeiðsla	5.000	**-4.700**	300

4.38.3. Samskifti.

4.38.3.06. Umlegging av Telefonverk Føroya Løgtings til partafelag. Nýggj høvuðskonto

Í lógaruppskotinum um umlegging av Telefonverk Føroya Løgtings til partafelag - løgtingsmál nr. 32/1997 - er ætlanin at allar ognir og allar skuldbindingar stovnsins skulu leggjast nýggja felagnum til. Aftanfyri fær landið 100% av partabrøvunum í felagnum. Virðið á partabrøvunum vil soleiðis til eina og hvørja tíð svara til innara virði í felagnum umframt evt. goodwill.

Fyriliggjandi tøl eru fyribils og uppskot til byrjunarfíggjarstøðu fyri P/F Telefonverk Føroya Løgtings. Tann endaliga byrjunarfíggjarstøðu verður sett upp við støði í metanarfrágreiðing sambært partafelagslógini. Metanarfrágreiðingin tekur m.a. støðu í grannskoðaða ársroknskapinum fyri 1997.

Grannskoðanin er ikki endalig enn, og í høvuðsheitum vantar endalig niðurstøða til hesi økir: vorogonmslur og avseting til eftirlønarskyldur. Sambært fyribilsuppgerð er avsett 8.000 tkr. til eftirlønarskyldur.

Av tí at grannskoðanin av ársroknskapinum fyri 1997 og metanarfrágreiðingin ikki eru endaliga liðug kunnu verða framdar broytingar í byrjunarfíggjarstøðuni. Væntandi verða ikki týðandi broytingar framdar.

Sundurgreinað ætlan

tús. kr.	**J**	**EY.J**	**J+EY.J**
Útreiðslujáttan	-	**241.241**	241.241
Inntøkujáttan	-	**241.241**	241.241
01. Stuðul			
Útreiðslur	-	**241.241**	**241.241**
81. Keyp av virðisbrøvum	-	**92.495**	92.495
83. Afturgjald av lánum	-	**148.746**	148.746
Inntøkur	-	**241.241**	**241.241**
42. Søla av løgum	-	**241.241**	241.241

Týsdagin 31. mars 1998 var atkvøðugreiðsla um skriv frá 6 tingmonnum um at víkja frá tíðarfreistini á øllum viðgerðarstigum. Hetta fall við 9-1-12.

1. viðgerð hósdagin 2. apríl 1998.Eisini var atkvøðugreiðsla um skriv frá 6 tingmonnum um at víkja frá tíðarfreistini millum 1. og 2. viðgerð og 2. og 3. viðgerð. Hetta var samtykt 15-2-0. Uppskotið varð uttan nevndarviðgerð beint til 2. viðgerð.

2. viðgerð friggjadagin 3. apríl 1998. Uppskot landsstýrisins samtykt við 18-0-2. At uppskotið soleiðis samtykt kann fara til 3. viðgerð samtykt 18-2-0.

3. viðgerð leygardagin 4. apríl 1998. Uppskotið, sum samtykt við 2. viðgerð, endaliga samtykt 22-0-0.

L.l. nr. 44 frá 08.04.1998

2 Ríkislógartilmæli um at seta í gildi í Føroyum broytingar í »lov om banker og sparekasser m.v.«

Ár 1997, leygardagin 9. august legði løgmaður vegna Anfinn Kallsberg, landsstýrismann, vegna landsstýrið fram soljóðandi:

Uppskot
til
ríkislógartilmæli

Tilmælt verður ríkismyndugleikunum við kongiligari fyriskipan at seta í gildi í Føroyum hesar lógir við tilskilaðu broytingum:

I

»Lov nr. 1091 af 22. december 1993 om ændring af lov om banker og sparekasser m.v.«.

II

»Lov nr. 1090 af 21. december 1994 om ændring af lov om banker og sparekasser m.v., lov om indkomstbeskatning af aktieselskaber m.v., lov om fusion, spaltning og tilførsel af aktiver m.v. og lov om stempelafgift« við hesum broytingum:

1) Í § 1, punkt 9, verður í stk. 3, nr. 2) »danske« broytt til: »færøske og danske«.
2) §§ 2, 3 og 4 verða strikaðar.

III

§ 19 í »lov nr. 367 af 14. juni 1995 om en indskydergarantifond ».

IV

»Lov nr. 368 af 14. juni 1995 om ændring af lov om banker og sparekasser m.v.«.

V

»Lov nr. 1072 af 20. december 1995 om værdipapirhandel« sum broytt við »lov nr. 376 af 22. maj 1996 om ændring af lov om banker og sparekasser m.v., lov om investeringsforeninger og lov om forsikringsvirksomhed og forskellige love«. Í § 119 verða orðini »§ 33, stk. 3« sett í gildi í Føroyum.

VI

»Lov nr. 376 af 22. mai 1996 om ændring af lov om banker og sparekasser m.v., lov om investeringsforeninger og lov om forsikringsvirksomhed og forskellige love« við hesum broytingum:

1) §§ 3, 4, 5, 7, og 9 verða strikaðar.

VII

§ 2 í »Lov nr. 475 af 10. juni 1997 om ændring af lov om forsikringsvirksomhed, lov om banker og sparekasser m.v., realkreditloven, lov om værdipapirhandel m.v., lov om lønmodtagernes Dyrtidsfond og lov om Arbejdmarkeders Tillægspension (Ledelsesregler, placeringsregler m.v.)« við hesum broytingum:

1) Í § 6 a, stk 4 verður aftan á »Aktieselskabslovens bestemmelser« sett: »(jf. anordning nr. 250 af 3. maj 1993 om ikrafttræden for Færøerne af lov om aktieselskaber)«.
2) Í § 6 c, stk 1, 2. pkt verður aftan á »Aktieselskabslovens bestemmelser« sett: »(jf. anordning nr. 250 af 3. maj 1993 om ikrafttræden for Færøerne af lov om aktieselskaber)«.
3) Í § 42 b, stk. 4 verður »skattekontrollovens § 8 H« broytt til: »lagtingslov nr. 86 af 1. september 1983 om landsskat og kommuneskat med senere ændringer«.
4) Í § 42 b, stk. 5 verður »om beskatningen af pensionsordninger m.v.« broytt til: »lagtingslov nr. 51 fra 29 december 1971 om skat af renteforsikring m.v. med senere ændringer«.
5) Í § 42 b, stk. 6 verður »lov om beskatningen af pensionsordninger m.v.« broytt til: »lagtingslov nr. 51 fra 29. december 1971 om skat af renteforsikring m.v. med senere ændringer«.

Viðmerkingar

Lóg nr. 57 frá 2. februar 1993 um bankar og sparikassar varð sett í gildi fyri Føroyar 3. mai 1993 við kongaligari fyriskipan nr. 246.

Síðani er danska lógin fleiri ferðir broytt, men hesar broytingar hava ikki verið settar í gildi í Føroyum.

Nú verður skotið upp at seta allar broytingarnar í gildi fyri Føroyar, soleiðis at lógin er dagførd.

Skotið verður upp at gera tað soleiðis, at allar broytingarlógirnar verða settar í gildi í senn við eini kongaligari fyriskipan, í staðin fyri at samanskriva broytingarnar. So ber altíð til at sláa upp í teimum donsku lógarverkunum og finna broytingarnar í røttu ruðfylgjuni.

Tilfarið er rúgvusmikið, men tað er nú einaferð soleiðis, at bankaøkið er danskt lógarøki, sum javnan verður tillagað ES-krøvum.

Tað verður tí hildið rættast, sum tað eisini varð sagt, tá galdandi danska banka- og sparikassalógin varð sett í gildi í Føroyum, at lógir galdandi á bankaøkinum í Føroyum eiga at liggja so tætt upp at lógum galdandi á bankaøkinum í londunum rundan um okkum sum til ber, fyri at styrkja álitið á okkara peningastovnar og lætta um samarbeiðið millum føroysku peningastovnarnar og teir útlendsku, tí sonn kendu lógir eru galdandi.

Tað hava verið rættiligu nógvar broytingar í banka- og sparikassalógini seinastu árini. Nakrar fyri at laga seg til tey ES-direktiv, sum eru sett í gildi fyri ES-londini, og aðrar sum avleiðing av broytingum, tí aðrar lógir á fíggjarøkinum eru broyttar.

Serstakliga eru tað 6 ES-direktiv, sum eru samtykt fyri ES-londini síðani 1989, sum eru grundarlagið fyri broytingunum í banka- og sparikassalógini.

Sum heild kann sigast um hesi ES-direktiv, at tey eru ein royndl at tátta í krøvini til og herða eftirlitið við fíggjarstovnunum, og samstundis gera felags reglur fyri fíggjarstovnarnar, og soleiðis styrkja bankaskipanina sum heild tvørturum landamørkini.

Her skal høvuðsendamálið í hesum ES-direktivum stutt verða nevnt. Tað gongur so aftur í lógarbroytingunum.

1989. Ætlanin við solvensdirektivinum er at harmonisera lógarásettu minstakrøvini til kreditstovnanna andsvarliga kapital. Tað vil siga, at tað verða sett felags solvenskrøv til allar kreditstovnar í øllum

1989. Eginognardirektivið ásetir, hvørji kapitalelement kunnu vera partur av andsvarliga kapitalinum hjá kreditstovnunum. Tann andsvarligi kapitalurin er partur, tá t.d. solvensprosentið verður roknað, og tá uppgjørt verður, hvussu stórar einstaklingaskuldbindingar ein stovnur kann hava.

1992. Direktivið um »overvågning af kreditinstitutters store engagementer« hevur sum endamál at seta mark fyri, hvussu stórar skuldbindingar ein stovnur kann hava við ein kunda ella ein bólk av kundum, sum hava slíkt samband sínámillum, at tað hevur við sær felags risiko fyri eina ávísa skuldbinding. Eisini er endamálið at gera felags reglur fyri, hvussu verður ansað eftir og vaka yvir teimu stóru skuldbindingunum við einstakar kundar, sum fíggjarstovnarnir gera fyri at spjaða risikoina og soleiðis styrkja bankskipanina sum heild.

1992. Konsolideringsdirektivið inniheldur reglur um, at reglur um solvens, stórar einstakar skuldbindingar v.m. ikki bara eru galdandi fyri peningastovnar, men eisini fyri peningastovnakonsernir.

1993. Direktivið um krøvini til »investeringsselskabers og kreditinstitutters kapitalkrav« (kapitalkravsdirektivið) ella eisini nevnt (CAD direktivið) hevur við sær, at tað verða sett krøv til peningastovnarnar, sum eru bundin at peningastovnanna marknaðarrisiko, tað er risiko fyri tapi av rentu, aktiu- ella valuta broytingum v.m.

1995. BCCI direktivið hevur til endamáls at styrkja eftirlitið við fíggjarvirkjum (finansielle virksomheder), sum hava tætt samband við onnur virki ella persónar, eisini um hesi sambond ganga (vørtur um landamørkini.

Bakgrundin fyri hesum ES-direktivi eru tær royndir, ið gjørdar vórðu, tá altjóða bankkoncernin Bank of Credit and Commerce International (BCCI) mátti lata aftur í 1991.

Sermerkt við hesum banka var, at koncernstruktururin var so fløktur, at tað hevði gjørt eftirlitið við bankanum nærum ómøguligt.

- - - - -

Hjálagt eru tær donsku lógirnar, sum skulu setast í gildi, og viðmerkingarnar til tær einstøku lógargreinirnar. Sostatt verða hert gjørdar stuttar viðmerkingar til tær einstøku lógirnar, sum skulu setast í gildi.

Hjálagt eru eisini tey ES-direktiv, sum eru grundarlag fyri teim einstøku lógunum.

Uppskotnu lógarbroytingarnar koma ikki at hava eykaútreiðslur ella umsiting við sær.

Við hesum lógarbroytingum verður galdandi bankalóggava í Føroyum tillagað lóggávuni á økinum í londunum rundan um okkum.

Lógarbroytingarnar eru gjørdar í samráð við umboð fyri Landsbanka Føroya, Føroya Banka og Føroya Sparikassa. Toll- og Skattstova Føroya hevur havt broytingarlógirnar til ummælis.

Viðmerkingar til tær einstøku lógirnar

Lóg nr. 1091 fra 22. desember 1993 »om ændring af lov om banker og sparekasser m.v.«
Høvuðsendamálið við lógarbroytingini er at harmonisera bankalóggávuna innan fyrt ES, serstakliga krøvini til solvens og risikospjaðing peningastovnanna grundað á ES-direktivið frá 21. desember 1992 »om overvågning af og kontrol med kreditinstitutters store engagementer«.

§ 23, sum avmarkar, hvussu stórar skuldbindingar ein peningastovnur kann gera við ein kunda ella ein bólk av kundum, sum hava eitt samband sínamillum, soleiðis at teir hava felags risiko, verður heilt broytt.

Eftir nógaldandi lóg kann ein skuldbinding ikki vera meira enn 35% av peningastovnsins kjarnukapitali og uppskrivingarburturleggingum og kann hækkast til 50%, um 2/3 av nevndini góðkenna tað. Men í hvørjum einstøkum føri skal hetta fráboðast Fíggjareftirlitinum.

Aftan á broytingina kann ein skuldbinding ikki vera størri enn 25% av peningastovnsins andsvarliga kapitali, og skuldbindingar størri enn 10% skulu hvønn ársfjórðing fráboðast Fíggjareftirlitinum.

Tann samlaða upphæddin av skuldbindingum, sum er yvir 10% ella meira av andsvarliga kapitalinum, má ikki vera meira enn 800% av peningastovnsins andsvarliga kapitali.

Við tað at bert ein banki og 3 sparikassar eru í Føroyum, kann tað koma at merkjast meira hjá føroysku peningastovnunum, tá táttað verður í her, enn í størri londum, har tað eru nógvir bankar, ið arbeiða á marknaðinum.

Men samstundis eru allar tær reglur, sum settar verða í gildi í londunum rundan um okkum, sum hava við trygd peningastovnanna at gera, tað sum ringast ber til ikki at seta í gildi í Føroyum.

Tað kann gerast ein trupulleiki fyri álit peningastovnanna serstakliga utanlands, um føroysku peningastovnarnir ikki kunnu gangа undir somu treytir, sum peningastovnarnir í londunum rundan um okkum, tá tað snýr seg um at spjaða risikoina og á henda hátt styrkja peningastovnin.

Sum er, eru nýggju krøvini til støddina á skuldbindingum ikki nakar stórur trupuleiki hjá føroysku peningastovnunum. Hildið verður, at tað ber til at laga seg til nýggju krøvini um risikospjaðingina samhært donsku lógunum, sum nú verður skotið upp at seta í gildi í Føroyum uttan at gera broytingar í tíðarfreistunum.

Ein onnur týðandi broyting í lógini er, at peningastovnar ikki longur kunnu bjóða lán til at keypa kapitalinnskot.

Tað hava verið dømi um, at kundar hava fingið tilboð um lán til at keypa t.d. partabrøv í sama banka.

Krøvini verða sostatt herd. Tað verður nú ikki loyvt at bjóða lán til at keypa ískoytiskapital ella andsvarligan kapital.

Lóg nr. 1090 frá 21. desember 1994 »om ændring af lov om banker og sparekasser m. v., lov om indkomstbeskatning af aktieselskaber m.v., lov om fusion, spaltning og tilførsel af aktiver m.v. og lov om stempelafgift«
Høvuðsbroytingarnar eru nútímansgerð av gjaldsføriskrøvunum til peningastovnarnar (§ 28) og at skapa møguleikar fyri, at lutakassar ella samtak av lutakassum kunnu broyta skipan til partafelag.

Í 1988 fingu sparikassarnir við lóg henda møguleika. Sostatt verða við hesi lógarbroyting bankar, sparikassar og lutakassar javnsettir lógarliga.

Eisini verða krøvini til ársfrágreiðingina hjá børsskrásettum peningastovnum dagførd. Enn eru teir føroysku peningastovnarnir ikki børsskrásettir.

Peningastovnarnir gera ársroknskap eftir banka og sparikassalógini, tó er kap. 8 a í ársroknskaparlógini í gildi fyri peningastovnarnar. Hildið verður rímiligt at seta somu krøv til børsskrásettar peningastovnar, sum til onnur børsskrásett felløg. Tí verður banka og sparikassalógin broytt, so hon samsvarar ársroknskaparlógini.

§§ 2, 3, og 4 skulu ikki setast í gildi í Føroyum, tí hetta eru broytingar í donskum skattalógum.

Í § 2 er talan um donsku »vinnufelagsskattalógina«.

Í § 3 er talan um donsku »fusionskattalógina«.

Í § 4 er talan um donsku lógina um »stempulgjald«.

Toll- og Skattstova Føroya sigur, at lógarbroytingarnar í banka- og sparikassalógini fara ikki at hava broytingar við sær í føroysku skattalógini.

Lóg nr. 367 frá 14. juni 1995 »om en indskydergarantifond«
Løgtingið hevur samtykt at lóg nr. 367 kann setast í gildi Føroyum við kgl. fyriskipan, men tó ikki § 19, sum eru broytingar í banka og sparikassalógini v.m. Men lógin er ikki lýst enn.

Nú verður skotið upp at seta § 19 í gildi fyri Føroyar.

Broytingarnar eru tillagingar og avleiðing av broytingum í »lov om en indskydergarantifond«.

Í § 19, punkt 1 verður skotið upp at seta eitt nýtt stykki 3 í § 22 sum sigur, at um so er, at kapitalur, sum er nevndur í stk. 1 og 2 verður útgivin sum hópskuldarbrøv, skal peningastovnurin kalla hesi kapitalprógv.

Hetta er gjørt eftir tilmæli frá »Det Tværministerielle Kontaktudvalg vedrørende det Finansielle Marked« út frá royntlum frá kreppum, verið hava í peningastovnum, sum hava víst, at hesin kapitalur hevur verið hildin at havt havt eina størri trygd, enn hann í roynd og veru hevur havt.

Við at kalla besi kapitalprógv, verður heilt klárt sagt frá, at talan ikki er um realkredit- og statsobligatiónir.

Lóg nr. 368 frá 14. juni 1995 »om ændring af lov om banker og sparekasser m.v.«
Orsøkin til at danir hava sett hesa broytingarlóg í gildi, er ES direktivið frá 15. mars 1993 um »kravene til investeringsselskabers og kreditinstitutters kapitalgrundlag« (kapinalkravsdirektivið) ella eisini kallað (CAD direktivið).

Í fyrra lagi inniber kapitalkravsdirektivið, at tað verða sett kapitalkrøv til peningastovnarnar, sum eru treytað av stovnanna marknaðarrisiko. Tað er vandi fyri tapi orsakað av rentubroytingum, partabræva- ella gjaldoyrisbroytingum v.m.

Tá CAD direktivið verður innarbeitt í lógina, verða broytingar gjørdar í kap. 5 um solvens, tað eru § § 21, 21 a og 22, soleiðis at marknaðarrisikomomentið kemur inn í lógina.

§ 21 inniheldur reglur um minstukrøv til peningastovnanna solvensprosent og § 21 a reglur um tann kapital, sum kann takast við í uppgerðina av solvensprosentinum. § 22 áseluir krøvini fyri, at ein peningastovnur kann rokna afturumsettan kapital sum eitt part av kapitali, sum verður roknaður uppí, tá solvensprosentið verður uppgjørt.

Samstundis dettur møguleiki peningastovnanna fyri at rokna umsvarligan innskotskapital uppí solvensuppgerðina burtur.

Í øðrum lagi inniheldur kapitalkravsdirektivið eitt ískoyti til direktivið um stórar skuldbindingar.

Við lóg nr. 1091, sum gjørdi avmarkingar í skuldbindingunum, ein peningastovnur kann hava við ein kunda ella ein bólk av risikoforbundnum kundum, bleiv núgaldandi § 23 heilt umskrivað.

CAD direktivið innførir hugtakið »handilsbeholdningar«, og fær hetta ta ávirkan á § 23, sum snýr seg um risikospjaðingina, at øll § 23 verður enn einaferð umskrivað. Eisini verður ein nýggj § 23 a innført.

Nú verður gjørt eitt uppbýti av virkseminum hjá einum peningastovni uttan fyri og innan fyri handilsbeholdningin. Tann nýggja § 23 sigur, hvat er uttan fyri handilsbeholdningin, og hvat er innanfyri.

Tað avmarkar soleiðis, at teir partar av eini skuldbinding hjá einum kunda ella einum kundabólki, sum er innihildið í handilsbeholdninginum, verður uppgjørt eftir serligum prinsippum.

Lóg nr. 1072 frá 20. desember 1995 »om værdipapirhandel« sum broytt við lóg nr. 376 frá 22. mei 1996 um »ændring af lov om banker og sparekasser m.v., lov om investeringsforeninger og lov om forsikringsvirksomhed og forskellige love«
Hetta lógin er sett í gildi í Føroyum, men tað er bara § 119 »§ 33, stk. 3« sum skal setast í gildi í Føroyum, tí restin av § 119 er í gildi.

Tá lógin um virðisbrævahandil varð sett í gildi í Føroyum, bar ikki til at seta hesa broytingina í gildi fyri Føroyar, tí tann parturin av banka- og sparikassalógini, sum hetta broytir, var tá ikki settur í gildi fyri Føroyar.

Lóg nr. 376 frá 22. mei 1996 um »ændring af lov om banker og sparekasser m.v., lov om investeringsforeninger og lov om forsikringsvirksomhed og forskellige love«
Tað eru tríggjar høvuðsbroytingar við hesi broytingarlóg.

Tann fyrsta er at innarbeiða BCCI-direktivið um styrkt eftirlit við fíggjarvirkjum, sum eru partur av tættum sambandi við onnur virkir ella persónar, eisini um hesi sambond ganga tvørtur inn landamørk.

Tað hevur víst seg seinastu árini, at hesi tættu sambondini millum virkir hava økta risiko við sær.

Til dømis verður skotið upp, at Fíggjareftirlitið kann nokta loyvi til at reka fíggjarvirksemi um so er, at tað eru tætt bond millum fíggjarvirki og onnur virki ella persónar, eisini tvørtur um landamørk.

Eisini verður skotið upp, at áleggja grannskoðarum eina serliga fráboðanarskyldu fyri hesar stovnar viðvíkjandi tættum sambandi milllum stovnarnar.

Tann næsta broytingin er at innarbeiða í banka- og sparikassalógina tilmæli frá Koktvedgaardrapportinum um, at eftirlitsfunktiónin, tað er eftirlit á staðnum og fráboðanir í heila tikið, eigur at styrkjast gjøgnum eina greiðari lógarmarkering.

Koktvedgaardrapporturin mælir til, at Fíggjareftirlitið oftari fer út á peningastovnarnar til eftirlit, tí tað hevur víst seg hjá teimum peningastovnum, sum hava verið í kreppu seinastu árini, at tá komið var á staðið, bleiv ein varugur við, at trupulleikarnir á stovninum vóru størri, enn eftirlitsmyndugleikarnir høvdu fingið varhugan av frá teim vanligu fráboðanum, teir høvdu fingið.

Á tann hátt ber kanska til at koma fram á trupulleikarnar, soleiðis at teir kunnu verða loystir, meðan tíð er.

Tann triðja høvuðsbroytingin er, at lógin um »visse kreditinstitutter« verður sett úr gildi.

Lógin er sum heild lítið brúkt. Nakrar broytingar eru tó gjørdar í banka- og sparikassalógini, soleiðis at tey pætti í lógini um »visse kreditinstitutter«, sum hildið hevur verið neyðugt at varðveita, eru komin við í banka- og sparikassalógina.

§ 3 skal ikki setast í gildi í Føroyum, tí lógin um »investeringsforeninger« er ikki galdandi í Føroyum.

§ 4 skal ikki setast í gildi fyri Føroyar, tí talan er um donsku »forsikringslógina«. Tryggingarøkið er yvirtikið málsøki.

§§ 5, 7 og 9 skulu ikki setast í gildi í Føroyum, tí talan er um danskar lógir, sum ikki eru í gildi í Føroyum.

Lóg nr. 475 frá 10. juni 1997 um »ændring af lov om forsikringsvirksomhed, lov om banker og sparekasser m. v., realkreditloven, lov om værdipapirhandel m. v., lov om lønmodtagernes Dyrtidsfond og lov om Arbejdmarkedets Tillægspension (Ledelsesregler, placeringer m. v.)«
Tað er bara § 2 í hesi lógini, sum viðvíkur banka- og sparikassalógini, og verður sett í gildi fyri Føroyar í hesum umfarinum.

Tað eru tríggjar høvuðsbroytingar.

Tann fyrsta er, at reglurnar í partafelagslógini um útlendsk filialer verða galdandi.

Í Føroyum verða tað so tær reglur, sum eru galdandi í Føroyum sambært ríkislógartilmæli nr. 250 frá 3. mei 1993 »om ikrafttræden for Færøerne af lov om aktieselskaber«.

Tað merkir, at § 6, stk. 4 verður umskrivað, soleiðis at tey filialir, sum nevnd eru í stk. 1 í hesi §, nú skulu skrásetast.

Tann næsta og størsta broytingin er í § 19, sum umfatar reglur fyri stjórar, deildarstjórar, internar grannskoðarar og onnur leiðandi starvsfólk í peningastovnunum við sjálvstøðugari leiðaraábyrgd, har vandi kann verða fyri samanblanding av áhugamálum peningastovnsins og egnum áhugamálum.

§ 19 verður heilt umskrivað, víðkað og gjørd nógv ágreiniligari.

Tann triðja høvuðsbroytingin er í § 42 b í banka- og sparikassalógini, sum ásetur hvar ein peningastovnur kann plasera pening, ið settur verður inn á ymiskar pensiónskonti.

Í § 42 b, stk. 4 verður víst til »skattekontrollovens § 8H«. Hetta er donsk lóg, sum ikki er galdandi í Føroyum, tí verður her víst til tilsvarandi føroyska lógina á økinum, sum er løgtingslóg nr. 86 frá 1. september 1983 um landsskatt og kommunuskatt við seinni broytingum.

Somuleiðis er í stk. 5 og 6 víst til donsku lógina »om beskatningen af pensionsordninger m.v.« og í hesum føri er føroyska lógin, løgtingslóg nr. 51 frá 29. desember 1971 um skatt av rentutrygging v.m. við seinni broytingum.

(Skjølini, sum viðløgd eru, eru lógirnar og viðmerkingar ráðharrans, tá ið uppskotini til lógir vóru lagdar fyri fólkatingið. Tey eru burturúrløgd í løgtingstíðindum. Víst verður til lovtidende og folketingstidende).

1. viðgerð 16. september 1997. Uppskotið varð beint í fíggjarnevndina, sum 28. oktober 1997 legði fram soljóðandi:

Áitt

Málið er lagt fram av landsstýrinum tann 9. august 1997 og eftir 1. viðgerð tann 16. september 1997 beint í fíggjarnevndina.

Lógin um bankar og sparikassar varð sett í gildi fyri Føroyar við kongaligari fyriskipan nr. 246 frá 3. mai 1993. Síðani er danska lógin broytt fleiri ferðir, men hesar broytingar eru ikki settar í gildi í Føroyum. Í fyriliggjandi ríkislógartilmæli verður mælt til at seta allar broytingarnar í gildi fyri Føroyar soleiðis, at lógin er dagførd, og mælt verður til, at allar broytingarlógirnar verða settar í gildi í senn við eini kongaligari fyriskipan.

Fíggjarnevndin hevur viðgjørt málið og hevur undir viðgerðini havt fund við umboð fyri arbeiðsbólkin, sum hevur gjørt lógaruppskotið í samráð við landsstýrið.

Undir viðgerðini hevur fíggjarnevndin umrøtt tann vansa, sum stendst av, at føroyskir myndugleikar onga fráboðan fáa frá Fíggjareftirlitinum viðvíkjandi støðuni hjá peningastovnum í Føroyum. Tá nýggja bankalógin kom í gildi 1. juli 1993 kom at standa í § 50, stk. 2, nr. 9, at ráðharrin kann sum liður í sínum yvirumsjón við peningastovnunum fáa upplýsingar frá Fíggjareftirlitinum, eisini viðvíkjandi peningastovnum í Føroyum, men landsstýrið fær onga fráboðan.

Í fyriliggjandi uppskoti III um innsetaratryggilargrunn verður skotið upp at broyta bankalógina § 50, stk. 2, nr. 10 soleiðis, at tær føstu nevndirnar hjá Fólkatinginum kunna í ávísum førum, tá ein peningastovnur er komin í trongstøðu, fáa fráboðan frá Fíggjareftirlitinum, eisini um peningastovnar í Føroyum, men onki verður nevnt um løgtingsnevndir.

Meirlutin í fíggjarnevndini (Jóannes Eidesgaard, Finnbogi Ísakson, Petur Jacobsen og Helena Dam á Neystabø) setir fram broytingaruppskot, sum miðar ímóti at tryggja heimastýrinum innlit í støðuna hjá peningastovnum í Føroyum. Skotið verður upp at mæla stjórnini til at broyta bankalógina soleiðis, at heimastýrið fær somu fráboðanir sum danski ráðharrin og Fólkatingsins føstu nevndir.

Verður fyriliggjandi uppskot samtykt óbroytt, fáa Fólkatingsins føstu nevndir rætt til upplýsingar um føroyskar peningastovnar í ávísum førum, meðan løgtingsins føstu nevndir onki fáa at vita. Meirlutin mælir tí tinginum frá at samtykkja uppskotið óbroytt.

Minnilutin í fíggjarnevndini (Sune Jacobsen, Eyðun Videro og Ernst Hansen) er samdur við meirlutan í, at føroyskir myndugleikar eiga at fáa fráboðan um støðuna hjá peningastovnum í Føroyum, men setir sítt egna uppskot fram sum uppskot til samtyktar, har heitt verður á landsstýrið um at taka upp samráðingar við ríkisstjórnina um broytingar í banka- og sparikassalógini soleiðis, at henda tryggjar, at tað verður eitt lógásett skylda hjá donskum ráðharrastovum og Fíggjareftirlitinum at fyri eitt at fráboða upplýsingar um føroyskar peningastovnar, sum hava ella metast at kunna hava – ávirkan á fíggjarviðurskifti landsins.

Uppskotið til ríkislógartilmæli er býtt upp í sjey punkt, merkt: I, II, III, IV, V, VI og VII.

I. Lóg nr. 1091 frá 22. desember 1993 »om ændring af lov om banker og sparekasser m.v.«
Høvuðsbroytingin við hesari lógini er at avmarka skuldarbindingina, sum ein peningastovnur kann hava við ein einstakling, eina fyritøku ella eina samtøku av fyritøkum, í mun til galdandi lóg.

Sum er, kann skuldarbindingin hjá einum peningastovni til ein einstakling, eina fyritøku ella eina samtøku av fyritøkum vera 35% av kjarnukapitalinum og uppskrivingar-burturleggingunum hjá peningastovninum. Skuldarbindingin kann tó hækkast til 50%, um 2/3 av nevndini taka undir við hesum. Verður hetta gjørt, skal Fíggjareftirlitið hava fráboðan í hvørjum einstøkum føri.

Hetta verður broytt soleiðis, at skuldarbindingin til ein einstakan kunda ella eina samtøku av kundum kann ikki fara upp um 25% av tí ansvarliga kapitalinum, sum er kjarnukapitalur og supplerandi kapitalur tilsamans. T.v.s. at skuldarbindingin verður hereftir ikki meira enn helvtina av tí mesta, sum var loyvt frammanundan.

Í Føroyum eru hert fýra peningastovnar – ein banki og tríggir sparikassar – og ongin av teimum er stórur eftir altjóða meti. Avmarkingarnar kunna tí hava størri ávirkan í Føroyum enn í stórri londum við sterkari peningastovnum. Men tað verður ikki hildið at vera ráðiligt, at krøvini, sum verða sett føroyskum peningastovnum, eru linari enn tey krøv, sum verða sett peningastovnum í øðrum londum í Evropa, bæði innan fyri og uttan fyri ES.

Tað er upplýst fyri fíggjarnevndini, at eginpeningurin hjá peningastovnunum er nóg stórur til, at nýggja avmarkingin ikki er nakar trupulleiki. T.d. er eginpeningurin í Føroya Banka omman fyri 600 mió.kr. Varð avmarkingiu gjørd fyri fýra árum síðani, hevði verið neyðugt við skiftisreglum, tí tá var eginpeningur bankans ikki meira enn 280 mió.kr, t.v.s. at bankin hevði í mesta lagi kunnað havt eina skuldarbinding uppá 70 mió.kr. til ein einstakan kunda ella eina samtøku av kundum.

Ein onnur avmarkandi broyting í lógini er, at skuldarbindingar uppá 10% ella meiri mugu ikki vera størri enn 800% tilsamans av tí ansvarliga kapitalinum hjá einum peningastovni.

Verður Føroya Banki nýttur sum dømi, kunna skuldarbindingar uppá 10% ella meira ikki fara upp um 4,8 mia.kr. (sum er 800% av eginpeninginum uppá 600 mió.kr.). Ein skuldarbinding uppá 10% svarar til 60 mió.kr. Sostatt kunnu 80 kundar læna 10% av ansvarliga kapitalinum innan fyri markið uppá 4.8 mia.kr.

Hetta hevur ongan praktiskan týdning, tí nógv tær flestu skuldarbindingarnar hjá bankanum eru minni enn

10%. Haraftrat kemur, at tær samlaðu skuldarbindingarnar røkka ikki upp á 4,8 mia.kr. tilsamans.

Ein triðja broyting er, at peningastovnar kunna ikki bjóða fólki lán til at keypa kapitalinnskot í peningastovnin, t.d. at keypa partabrøv fyri. Eftir tí, sum er upplýst fyri fíggjarnevndini, hevur hetta ikki verið nakar trupulleiki í Føroyum, men broytingin er gjørd, tí peningastovnar í Danmark og øðrum londum hava nýtt hetta.

II. Lóg nr. 1090 frá 21. desember 1994 »om ændring af lov om banker og sparekasser m.v., lov om indkomstbeskatning af aktieselskaber m.v., lov om fusion, spaltning og tilførsel af aktiver m.v. og lov om stempelafgift«
Í høvuðsheitum snúgva broytingarnar seg um at gera tað møguligt hjá »andelskasser eller sammenslutninger af andelskasser« at umskipa seg til partafeløg á sama hátt, sum sparikassar fingu henda møguleika fyri nøkrum árum síðan.

Fyrimunurin við at reka virksemi sum partafelag er, at størri møguleikar eru fyri at víðka kapitalgrundarlagið, eitt nú við at bjóða út nýtekning av partapeningi móti útskriving av partabrøvum.

Fíggjarnevndini er upplýst, at »Andelskassar« vóru nógv nýttir fyrr í Danmark t.d. innan landbúnaðin, men nú eru bert nakrir fáir eftir.

Tað eru eingir »andelskassar« í Føroyum, men verður av tandsstýrinum mett rættast at taka hesa broyting við, nú øll lógin verður broytt.

Broytingarnar fevna eisini um peningastovnar, ið eiga tryggingarfeløg ella í dótturfeløgum, ið reka tryggingarvirksemi.

Uppskotið skapar grundarlag fyri javnari kapping millum peningastovnar og tryggingarfeløg.

Broytingarnar snúgva seg eisini um, at Fíggjareftirlitið kann áseta nærri reglur í sambandi við møguligar transaktiónir millum peningastovnar og virkir, sum beinleiðis ella óbeinleiðis standa í sambandi við peningastovnin (t.d. dótturfeløg).

Viðvíkjandi reglunum um likviditet verða hesar broyttar soleiðis, at í likviditetin kann eftir hesum uppskoti nú íroknast »beholdning af sikre, let sælgelige, ubelånte værdipapirer og kreditmidler«.

Dagføringar annars av lógini koma serliga at hava týdning fyri børsskrásettar peningastovnar, har m.a. kravið til ársroknskapin verður víðkað soleiðis, at umframt sjálvt roknskaparárslitið skal eisini kunna síggjast, hvussu hetta svarar til tær metingarnar, peningastovnurin hevði gjørt sær frammanundan og sum vóru almannakunngjørdar. Eisini skal grundgevast fyri, tá samsvar ikki gjørdist millum metingar og úrslit.

Annað krav til ársroknskapin verður, at tað skal sjónliggerast, hvørji møgulig leiðslustørv í øðrum partafeløgum, leiðslu- og nevndarlimir peningastovnanna røkja.

Føroyskir peningastovnar eru ikki børsskrásettir, og koma tí hesar reglur í løtuni ikki at hava nakra ávirkan á føroysku peningastovnarnar.

Tað hevur ikki eydnast fíggjarnevndini at fingið upplýst, hvør orsøkin er til, at føroyskir peningastovnar ikki eru børsskrásettir.

III: Lóg nr. 367 frá 14. juni 1995 »om en indskydergarantifond«
Galdandi lóg í Føroyum um innskjótaratrygdargrunn er lóg nr. 850 frá 23.12.1987 »om indskydergarantifonden«, meðan ein nýggj lóg, lóg nr. 367 frá 14.06.1995 »om en indskydergarantifond«, varð sett í gildi í Danmark 1. juni 1995.

Mest sjónliga broytingin í lógini frá 1995 er, at umframt at lúka fyriskipan ES-ráðsins, so varð hvør innsetari tryggjaður við upp til 300.000 kr. móti 250.000 kr. eftir gomlu lógini.

Heimastýrið ynskti at seta 1995-lógina í gildi, og varð ríkislógartilmæli um kongliga fyriskipan at seta lógina í gildi sent ríkismyndugleikunum 17. juli 1996, men er lógin ikki enn lýst at galda í Føroyum. Í tilmælinum varð grein 19 tikin burturúr, og er tað henda grein, sum Landsstýrið nú ynskir at fáa við í lógina.

Fíggjarnevndin hevur gjøgnum landsstýrið roynt at fingið eina grundgeving fyri, hví samtykta lógin frá 15. mai 1996 enn ikki er lýst í Føroyum, men hevur tað ikki eydnast at fingið nakra grundgeving.

Um so er, at heimastýrið tilmælir broytingina III, so er spurningurin, um grein 19 fer inn í lógina frá 1987, sum enn er í gildi í Føroyum, ella at kongaliga fyriskipanin um gildiskomu av innskjótaratrygdargrunninum verður lýst saman við broytingini viðvíkjandi grein 19.

Grein 19 í lógini um Innskjótaratrygdargrunn frá 14. juni 1995 er ein broyting til lógina um bankar og sparikassar (lógarkunngerð nr. 182 frá 20. mars 1995).

Í greinini verða seks broytingar skotnar upp, meðan viðmerkingarnar, sum Landsstýrið hevur latið løgtinginum, fevna um heilar níggju broytingar. Hetta kemur av, at danska uppskotið, tá tað varð lagt fyri fólkatingið, fevndi um níggju broytingar í grein 19, meðan samtykta broytingin fevndi um bert seks broytingar. Viðmerkingar eru ikki síðan rættaðar, so samsvar er millum lógarupskot og viðmerkingar til einstøku greinirnar.

Í viðmerkingunum til einstøku lógargreinirnar skulu undir grein 19 punktini 2, 3 og 4 strikast.

Fyrsta broytingin, skotin verður upp, er, at um so er, at kapitalur, sum er nevndur í grein 22, stk. 1 og 2, verður útgivin sum hópskuldarbrøv, so skal peningastovnurin kalla hesi kapitalprógv.

Royndirnar vísa frá bankakreppum, at lánsbrøv, útgivin av peningastovnum, sum hava støðu sum aftursettur kapitalur, oftani verða tikin fyri at hava fulla trygd eins og realkreditt- og ríkislánsbrøv.

Nú verður álagt peningastovnum, sum útgeva slík, at peningastovnurin kallar hesi kapitalprógv.

Onnur broytingin gevur møguleika fyri, at pensjónsuppsparingar (kapitalpensjón, ratauppsparing og sjálvpensjón) kunnu gerast í útlendskum peningastovni, sum hevur filial her í landinum.

Hesar uppsparingar veitir Innskjótaratrygdargrunnurin fulla trygd fyri, tá tær eru í donskum/føroyskum peningastovnum, men nú verður kravt, at um hesar eru teknaðar í einum filiali av útlenskum peningastovni, so skulu tær verða tryggjaðar antin í heimlandinum ella í Innskjótaratrygdargrunninum.

Um heimlandið ikki veitir fulla trygd, kann útbúðin tekna fulla trygd í Innskjótaratrygdargrunninum.

Triðja broytingin er, at kravið um, at Fíggjareftirlitið skal krevja ein peningastovn, sum er insolventur, at fara á húsagang (konkurs), verður broytt til, at Fíggjareftirlitið kann krevja peningastovnin at fara á húsagang.

Hetta fyri at geva møguleikar fyri samráðingum um aðra møguliga loysn.

Fjórða broytingin er, at tagnarskyldan í banka- og sparikassalógini verður gjørd linuri, soleiðis at Fíggjareftirlitið kann lata føstu nevndunum í fólkatinginum upplýsingar um ein peningastovn, sum er farin í gjaldsteðg ella er farin á húsagang (konkurs). Tó er tað ein avgjørd fortreyt, at tað er samtykt, at ríkiskassin veitir eina trygd ella við peningaveitingum er við til at gera peningastovnin upp (afvikle).
Fimta broytingin er, at til tess, at lógin ikki skal hava afturvirkandi kraft, so verða upplýsingar sambært fjórðu broytingini bert latnir nevndum hjá fólkatinginum við skjølum, sum eru skrásett í Fíggjareftirlitinum, eftir at lógin er komin í gildi.

Sætta og seinasta broytingin í grein 19 snýr seg um, hvørji revsitiltøk eru, um grein 22, stk. 3 (fyrsta broytingin) verður brotin. Revsingin er bót ella hefti, um ikki harðari revsing er sambært borgarligu revsilógini.

IV. Lóg nr. 368 frá 14. juni 1995 »om ændring af lov om banker og sparekasser m.v.«
Grundarlagið fyri broytingini er direktivið, sum nevnt verður CAD-direktivið frá 1993. Eftir galdandi lóg kunnu peningastovnarnir nýta tveir hættir at rokna solvensprosentið. Hetta er § 21, stk. 1, í galdandi lóg. Teir kunnu annaðhvørt nýta 8%-kravið, ella teir kunnu nýta 10%-kravið.

Solvensurin í 8%-kravinum verður roknaður sum lutfallið millum
1) ansvarligan kapital og
2) samløgu av vektaðum aktivum og ikki balansaførdum postum.
Ansvarligur kapitalur: Verður í vanligari talu nevndur eginpeningur.
Ikki balansuførdir postar: Tað eru ábyrgdir, sum bankin veitir kundum sínum, og keyp av fremmandum valuta.

Solvensurin í 10%-kravinum verður roknaður sum lutfallið millum
1) samløgu av ansvarliga kapitalinum og ansvarliga innskotskapitalinum og
2) samløguna av samlaðum vektaðum aktivum og ikki balansuførdum postum.
Ansvarligur innskotskapitalur: Tað er ábyrgdarpeningur, sum ikki er eginpeningur, men sum er vágafúsur kapitalur.

Meðan galdandi lóg var í gildi í Danmark, brúktu bert fáir peningastovnar 10%-kravið. Orsøkin var, at ansvarligi innskotskapitalurin ikki kundi dekka tap, uttan so at peningastovnurin fór í likvidatión ella á húsagang.

Verður uppskotið til ríkislógartilmæli samtykt, verða reglurnar um solvenskrøv broyttar nakað. Og fyri at gera reglurnar einfaldari, verður 10%-kravið ikki galdandi longur.

Solvensútrokningarnar um 8%-kravið verða broyttar soleiðis, at solvensurin nú er lutfallið millum
1) samløguna av ansvarliga kapitalinum og stuttfreistaða supplerandi kapitalinum og
2) vektaðum aktivum.
Stuttfreistaður supplerandi kapitalur: Hesin verður ikki brúktur í føroysku peningastovnunum, men er lutvíst partur av ansvarliga innskotskapitalinum.

Tað vil siga, at ansvarligi innskotskapitalurin ikki er við í útrokningunum longur, og harumframt er lagt upp fyri marknaðarbroytingum, tá talan er um aktivini.

Tá nýggju reglurnar vórðu settar í gildi í Danmark, vístu útrokningar, at miðalsolvensprosentið hjá donsku peningastovnunum var 1% lakari.

Upp á fyrispurning frá nevndini, hvørja ávirkan nýggju reglurnar fara at hava fyri føroysku peningastovnarnar, søgdu umboðini fyri hesar, at tað als ongan týdning kom at hava, tí í rokn-skapinum fyri 1996 høvdu peningastovnarnir roknað solvensin eftir nýggju reglunum.

V. Lóg nr. 1072 frá 20. desember 1995 »om værdipapirhandel« sum broytt við lóg nr. 376 frá 22. mai 1996 um »ændring af lov om banker og sparekasser m.v., lov om investeringsforeninger og lov om forsikringsvirksomhed og forskellige love«
Lógarbroytingin snýr seg um at seta í gildi grein 33, stk. 3 í lóg »om banker og sparekasser«

Hesin partur av galdandi lóg er broyttur í donsku lógini, áðrenn á at lógin varð sett í gildi í Føroyum.

Broytingin snýr seg um at fáa neyvari upplýsningar í ársfrágreiðingini hjá peningastovnum um møguligar broytingar í endaliga ársúrslitinum í mun til tað, ið ætlanin víst við ársbyrjan, og í mun til møguligar seinni frágreiðingar um gongdina í árinum.

Meiningin við hesum er at geva almenningínum greiða vitan um veruligu gongdina hjá peninga-stovninum, bóast tær frágreiðingar, ið annars verða givnar við ávísum millumbilum.

Við hesi broyting verður fráboðanarskyldan eisini í samsvar við krøvini í ársroknskaparlógini grein 56, stk. 3.

Kortini skal viðmerkjast, at sambært greinini er her talan um »børsskrásettar peningastovnar«, men fíggjarnevndini er upplýst, at ongir av føroysku peningastovnunum eru børsskrásettir. Partabrøvini í Føroya Banka eru tó skrásett í »Værdipapircentralen«, sum er ein elektronisk goymsla fyri virðisbrøv. Kortini verður mett, at rætt er at seta broyttu lógina í gildi í Føroyum, so lógin er greið, um ella tá børsskráseting hendir fyri verandi ella komandi peningastovnar.

Harafturat verður ásett, at í ársfrágreiðingini skal verða upplýst, um persónar í leiðsluni eru í leiðslu í øðrum partafeløgum, tó undantikið, tá peningastovnurin sjálvur eigur 100% av partapeninginum.

Henda áseting hevur kortini avmarkaðan týdning, um talan er um loyvi hjá stjórnarlimum at sita í nevndum í virkisvirkjum, tá loyvi til tílíkt starv skal fáast til vega frá Fíggjareftirlitinum. Henda skipan verður tó sera sjáldan nýtt.

VI. Lóg nr. 376 frá 22. mai 1996 um »ændring af lov om banker og sparekasser m.v., lov om investeringsforeninger og lov om forsikringsvirksomhed og forskellige love«
Endamálið við hesi lóg er at styrkja eftirlitið við bankum og sparikassum eins og fíggjarstovnum.

Her er ikki bert talan um at styrkja tað innlendska eftirlitið, men eisini eftirlitið tvørtur um landamørk.

Tað er staðfest, at tað tætta sambandið millum bankar og sparikassar og fíggjarstovnar øðrumegin og virkir og persónar hinumegin, hava gjørt fíggjareftirlitið tvørtur um landamørk sera trupult.

Út frá hesi staðfesting verður skotið upp, at innarheiða BCCI-direktivið um styrkt eftirlit við fíggjarvirkjum, sum eru partar av tættum sambandi við onnur virkir ella persónar, eisini um hesi ganga um landamørk. Eftirlitið fær heimild til at steðga slíkum virksemi.

Eisini fær eftirlitið heimild til, at áleggja granskoðaranum, at fráboðað slíkt virksemi.

Somuleiðis er innarbeitt í lógaruppskotið nøkur tilmæli frá tí sokallaðu »Kok-tvedgaardnevndini« um at styrkja tað innlendska eftirlitið soleiðis, at eftirlitið kann gera reglur um tey øki, sum hava stóran vanda (risici) fyri peningastovnarnar.

Eisini mælir »Koktvedgaardnevndin« til, at fíggjareftirlitið fer út á peningastovnarnar, meira enn tað, at gera sítt kanningararbeiði, eins og fráboðanir um hesi arbeiði verða styrkt eftir greiðari lógarnormering.

Eftir tilmæli frá »DET Tværministerielle Kontaktudvalg«, verður í lógaruppskotið sett, at eftirlitið kann seta annan grannskoðara enn tann, sum fíggjarstovnurin hevur.

Endamálið við hesum er at minka um vandan av, at fíggjarstovnsins egna grannskoðan ikki gevur ta neyðugu »kritisku« metanina um støðu stovnins.

Lóg nr. 376 fevnir so at siga um eftirlit við øllum fíggjarvirkseminum.

Landsstýrið mælir tí til, at fylgjandi greinar ikki verða settar í gildi fyri Føroyar:

Grein 3: Um Investeringsforeninger

Grein 4: Um Forsikringsvirksomheder

Grein 5: Um Firmapensionskasser

Grein 7: Um Fondsmæglerselskaber

Grein 9: Um ymsar danskar skattareglur

Undir viðgerðini í fíggjarnevndini eru spurningar reistir um landsstýrið hevur nakra ætlan um at seta greinina um tryggingarvirksemi í gildi fyri Føroyar.

Svarið er, at nevnda málsøki hoyrir undir Vinnumálastýrið og hevur tí ikki verið fyri í arbeiðsbólkinum, sum hevur viðgjørt hetta uppskotið.

Annars verður vist til viðmerkingarnar til lógaruppskotið frá landsstýrinum.

VII. Lóg nr. 475 frá 10. juni 1997 um »ændring af lov om forsikringsvirksomhed, lov om banker og sparekasser m.v., realkreditloven, lov om værdipapirhandel m.v., lov om lønmodtagernes Dyrtidsfond og lov om Arbejdsmarkedets Tillægspensinn (Ledelsesregler, placeringer m.v.)«

Bert § 2 í hesi lóg verður sett í gildi í Føroyum. Hon viðvíkir banka- og sparikassalógini.

Broytingarnar eru:

1) Reglurnar í partafelagslógini, sum varð kunngjørd í Føroyum í 1993, um útlendskar útbúðir (filial) verða galdandi. Útbúðirnar skula skrásetast. Hetta hevur neyvan praktiskan týdning í Føroyum. Bankar í øðrum ES-londum hava havt filialar í Danmark.
2) Onnur broytingin, sum er tann størsta, ásetir strangari reglur fyri starvsfólk við leiðaraábyrgd í peningastovnunum og grannskoðarar teirra. Endamálið er at forða fyri, at áhugamálini hjá starvsfólkunum og peningastovnunum verða løkt saman.
3) Tann triðja broytingin ásetir reglur um, hvar ein peningastovnur kann plasera pening.

Annars vísir fíggjarnevndin til viðmerkingar landsstýrisins til hesa lógarbroytingina.

Undir VI mælir nevndin til at strika pkt. 7 í § 8, tí hetta er broyting til § 123, ið ikki er sett í gildi fyri Føroyar.

Ein samd nevnd setir tí fram soljóðandi

broytingaruppskot

Í »VI« verður sett sum nýtt punkt 2: »2) Í § 8 gongur pkt. 7 út«.

Ein meirluti (Jóannes Eidesgaard, Finnbogi Ísakson, Petur Jacobsen og Helena Dam á Neystabø) vísir á viðmerkingar sínar í álitinum og setir fram soljóðandi

broytingaruppskot

I: »III« í uppskoti landsstýrisins fær hetta orðaljóð:
»§ 19 í »lov nr. 367 af 14. juni 1995 om en indskydergarantifond« við hesum broytingum:

1) »I § 50 b, stk. 2, får nr. 9 følgende ordlyd:
9) til vedkommende minister som led i dennes overordnede tilsyn. Oplysninger til ministeren angående pengeinstitutter på Færøerne tilstilles til orientering samtidig Færøernes hjemmestyre.«
2) »I § 50 b, stk. 2, indsættes efter nr. 9 som nyt nummer:
10) til Folketingets stående udvalg og, angående pengeinstitutter på Færøerne, desuden Færøernes Hjemmestyre, et pengeinstituts generelle økonomiske forhold som led i den parlamentariske kontrol med forvaltningen, for så vidt angår pengeinstitutter under betalingsstandsning eller konkurs, når staten eller, angående pengeinstitutter på Færøerne, den færøske landskasse stiller midler til rådighed for afvikling af instituttet.«
3) Nr. 10-12 bliver herefter nr. 11-13.

Um broytingaruppskot meirlutans I fellur, setir sami meirluti fram soljóðandi broytingaruppskot

II: »III« í uppskoti landsstýrisins fær hetta orðaljóð:

»§ 19 í »lov nr. 367 af 14. juni 1995 om en indskydergarantifond«, tó ikki nr. 4.

Ein minniluti (Sune Jacobsen, Eyðun Videro og Ernst Hansen) mælir til at samtykkja uppskot landsstýrisins við broytingini frá eini samdari figgjarnevnd.

2. viðgerð 5. november 1997. Broytingaruppskot I frá Jóannesi Eidesgaard, Finnboga Ísaksyni, Petur Jacobsen og Helenu Dam á Neystabø fall 11-1-11. Uppskot II frá teim somu samtykt 12-0-11. Uppskot III í uppskoti landsstýrisins soleiðis broytt samtykt 12-0-11. Broytingaruppskotið frá samdari nevnd til uppskot landsstýrisns VI samtykt 23-0-0 og uppskot landsstýrisins pkt. VI soleiðis broytt varð samtykt 23-0-0. Uppskot landsstýrisins við undantak av pkt. III og VI samtykt 23-0-0. At málið skuldi fara soleiðis samtykt til 3. viðgerð samtykt við 23-0-0 atkvøðum.

3. viðgerð 18. november 1997. Ríkislógartilmælisuppskotið sum samtykt við 2. viðgerð endaliga samtykt við 27-0-0 atkvøðum

Ríkislógartilmæli, 25. november 1997.
F.L. j.nr. 2561-5/91

3 Broyting í løgtingslóg um vinnuligan fiskiskap

Ár 1997, mikudagin 30. juli legði John Petersen, landsstýrismaður, vegna landsstýrið, fram soljóðandi:

Uppskot
til
løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um vinnuligan fiskiskap

§ 1

Í løgtingslóg nr. 28 frá 10. mars 1994 um vinnuligan fiskiskap við seinni broytingum verða gjørdar hesar broytingar:

1) Í § 5, stk 3 verða orðini »tvey ár« broytt til: »fimm ár«.
2) Í § 5, stk. 8 verður skoytt uppí: »Egin hjáveiðikvota er hjáveiðiparturin, ið landsstýrið hevur latið persóni ella felagi rættin at fiska, roknaður um til tons, rund vekt, av fiski.«
3) Í § 5, stk. 9 verður »1. juli« broytt til: »15. juni«.
4) Í § 8, stk. 3 verður aftaná orðini »í altjóða sjógvi« sett inn: »ella til fiskiskap á fjarleiðum sambært sínámillum fiskiveiðiavtalu,« .
5) § 14 stk. 1 verður orðað soleiðis:
»Fiskidagar kunnu umsetast frítt í 15 ár, roknað frá 1. september 1997, innanfyri hvønn undirbólk ásettir sambært § 29, stk. 1 eftir nærri reglum, sum landsstýrið áseliv. Fiskidagar kunnu verða lærtir ella leigaðir í sama fiskiári millum høvuðsbólkarnar ásettir sambært § 28, stk. 1, undantikið frá bólki 5 til hinar bólkarnir. tá 3 mánaðir eru eftir av fiskiárinum eftir nærri reglum, sum landsstýrið ásetur. Fiskidagar í høvuðsbólki 4, smb. § 28, stk. 1, kunnu ikki latast frá húki til trol. Fiskiveiðieftirlitið skal hava fráboðan um flyting av fiskidøgum, áðrenn farið verður at bróka fluttu dagarnar.«
6) § 14, stk. 2 og stk. 3 verða strikað.
7) Í § 15, stk. 2 verður orðingin »5 ár í senn« strikað og ístaðin verður sett inn »15 ár, roknað frá 1. september 1997«.
8) Í § 22, stk. 1 verður »1.juli« broytt til: »15. juni« og stk. 3 verður soljóðandi:
»Stk. 3. Fiskiárið byrjar 1. september og endar 31. august árið eftir. Fiskidagar fyri komandi árið verða ásettir í seinasta lagi 15. august sama árið, fiskiárið byrjar.«
9) Í § 27 verða árstølini »1996« og »1997« broytt ávikavist til: »1997« og »1998«.
10) Í § 28, stk. 2 verður aftan á orðingina »verður roknað« sett inn orðið »vegleiðandi«.
11) § 29, stk. 1 verður broytt soleiðis:
»Innan fyri hvønn av høvuðsbólkunum av fiskiførum í § 28, stk. 1, sum eru í veiðiflotanum 1. januar 1995, verður fiskidagaskipan ásett fyri hesar undirbólkar við hesum fiskidagatali, smb. tó stk. 3, sum verður býtt javnt millum fiskiførini, tó so at hædd verður tikin fyri møguligari umseting av fiskidøgum frá einum fiskifari til eitt annað í sama undirbólki, bólkur 5 tó undantikin:

Bólkur 2:	Partrolarar 7199 fiskidagar
Bólkur 3:	Línuskip yvir 110 BRT 2660 fiskidagar
Bólkur 4 A:	Útróðrarbátar millum 15-40 BRT 4696 fiskidagar
Bólkur 4 B:	Útróðrarbátar størri enn 40 BRT 4632 fiskidagar
Bólkur 5	Útróðrarbátar undir 15 BRT á húkaveiðu 23625 fiskidagar
Tøkir	577 fiskidagar

12) Í § 29, stk. 5 verður skoytt uppí:
»Landsstýrinum verður heimilað at gera undantøk frá hesum, um verandi fiskiloyvi til trolveiðu verður flutt til annað fiskifar í hesum bólki, har fiskiorkan verður tann sama ella minni.
13) Í § 40, stk. 1, pkt. 1) verður orðingin »§ 9, stk. 1 og stk. 2« strikað og ístaðin verður sett inn orðingin: »§ 9, stk. 1-4, § 9 a, stk. 1-2«.
14) Í § 40, stk. 1, pkt. 3) verður orðingin »§§ 7 og 8« broytt til: »§§ 7, 8, 14 og 15«, og eftir »§ 18« verður sett inn: »§ 19«.
15) Í § 45, stk. 1 verður eftir »§ 9« sett inn: »§ 9a«, og í § 45, stk. 2 fyrstu reglu verður »veiðiloyvi« broytt til: »veiði- og fiskiloyvi«.

§ 2.

Henda lóg fær gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

Viðmerkingar:

Lógin um vinnuligan fiskiskap varð broytt seinast við løgtingslóg nr. 84 frá 6. juni 1997.

Skipanarnevndin hevur samsvarandi lógini um vinnuligan fiskiskap latið landsstýrinum tilmæli um, hvussu fiskiskapurin skal skipast komandi fiskiár. Nevndin er ikki samd, og tilmæli til landsstýrið er í 3 pørtum.

Nevndin hevur út frá stovnsmetingunum frá Fiskirannsóknarstovuni og Stovnsrøktarnevndini mett, um ásetta fiskidagatalið fyri hvønn bólk av fiskiførtum tryggjar, at fiskastovnarnir verða gagnnýttir burðardygt, og um skipanin við fiskidøgum og stongdum økjum yvirhøvur tryggjar, at endamálini í lógini verða rokkin.

Nevndin hevur eisini viðgjørt fiskiskapin eftir svartkalva. Helta varð gjørt grundað á niðurstøðuna hjá Fiskirannsóknarstovuni og ICES/ACFM, har mælt verður til nummandi minking í royndini eftir svartkalva, tí stovnurin verður hildin at vera sera illa fyri.

Nevndin tekk til vega veiðuhagtøl og fiskidagatøl, sum eru grundað á avreiðingarseðlarnar mánaðarskeiðið 1. juni 1996 til 31. mai 1997 og fiskidagayvirlit sambært fráboðanum til Fiskiveiðieftirlitið.

Veiðan undir Føroyum hetta tíðarskeiðið er um 43.000 tons av toski, 11.000 tons av hýsu, 14.500 tons av upsa og 8.000 tons av kongafiski. Býtið av toskaveiðuni svarar væl til tann í § 28 ásetta rættin til tilfeingið, tó undantikið fyri hólkin útróðrarhátar yvir 15 tons, sum hevur fiskað væl minni enn tað, teimum er ásett at hava rætt til. Tey størru skipini – trolarar og línuskip – hava fiskað væl meira av hýsu enn sambært áseting unum í § 28, og tey minnu fiskiførini – útróðrarbátar bæði yvir og undir 15 tons – hava fiskað minni. Av upsanum hava trolarar fiskað meira enn ásett sambært § 28 og útróðrarhátarnir – serliga teir undir 15 tons – minni. Býtið av veiðuni millum trolararnar vísir, at partrolararnir hava fiskað væl meira enn teimum er givin rætturin til og lemmatrolararnir (djúpvatnstrolararnir) nakað minni.

Fiskidagatalið er gjørt upp grundað á talið av fiskidøgum, sum sambært fráboðanunum er skrásett at vera brúkt fram til 4. juli 1997, og er framroknað, hvussu nógv verður brúkt fram til endan á fiskiárinum 31. august 1997. Framrokningin vísir, at skipabólkarnir fara at hava úr 18% og upp í 70% eftir av teimum tillutaðu døgunum.

Uppgjørt er yvirlit yvir umbýttar fiskidagar (1:3) innan- og uttanfyri fiskidagaringin og í (1:2) yvir keyp og søla av fiskidøgum. Uppgerðin er at finna í tilmælinum frá Skiputrarnevndini til landsstýrið dagsett hin 21. juli 1997 og er latið øllum løgtingsmonnum. Ein samandráttur av tilmælinum frá Fiskirannsóknarstovuni og Stovnsrøktarnevndini eru eisini í hesum tilmæli frá Skipanarnevndini.

Landsstýrismaðurin í fiskivinnumálum leggur við hesum hetta lógaruppskot fyri løgtingið grundað á tey tilmæli, sum Skipanarnevndin hevur latið landsstýrinum, og við atliti at stovnsmetingunum hjá Fiskirannsóknarstovuni og Stovnsrøktarnevndini. Lógaruppskotið snýr seg í høvuðsheitinum um hesar broytingar:

- Fiskidagarnir fyri undirbólkarnar í § 29, stk. 1 verða fyri komandi fiskiár 12½% færri .
- Skipanin við innaru og ytru fiskidagaleiðini verður óbroytt.
- Økisfriðingarnar í lógini verða óbroyttar, tó verða tiltøk sett í verk í kunngerð til less at friða gýtingarleiðirnar hjá toski, hýsu og upsa.
- Veiðan eftir svartkalva verður minkað við tiltøkum í kunngerð við umleið 20%.
- Veiðan eftir kongafiski verður minkað við tiltøkutu í kunngerð í mesta mun.
- Veiðan á Føroya Banka verður á sama støði komandi fiskiár.
- Fiskidagarnir verða frítt umsetiligir í 15 ár í undirbólkunum, tó við avmarkingum í bólki 4 og 5.
- Kvotur á fjarleiðum verða frítt umsetiligar í 15 ár.

Hesi tiltøk skulu í høvuðsheitinum tryggja, at fiskastovnarnir undir Føroyum verða gagnnýttir burðardygt, og at skipanin við fiskidøgum og stongdum økjum tryggja, at endamálini í lógini um viðurskiftini fiskiskap verða rokkin, eisini við atliti at stovnum, sum ferðast um fiskimark (kongafiskur og svartkalvi) í samljóði við altjóða havrættin og samstarvi við onnur lond um skipan fyri fiskiskapi at tryggja sonn endamál.

Størsti meinbogin fyri at skapa fortreytir fyri einari burðardyggari fiskivinnu er, at øll fiskirættindi eru undir avmarkingum í 5 ár. Hóast stóra toskaveiðu á heimaleiðum og størstu kvotumøguleikum á fjarleiðum, so hevur føroyska fiskivinnan í dag eina óvirkna skipan á landleiðunum við avmarkaðum umsetiligum fiski-

døgum og á fjarleiðum við uvmankandi umsetiligum kvotum. Tað er tí alneyðugt at broyta hesa skipan nú, og er í uppskotinum miðað ímóti hesum við størri umsetiligheit av fiskirættindunum, og hervið at gera tað møguligt at hava eina fiskivinnu, sum ber seg. Hetta er alneyðugt í komandi tíðum, tí so nógv verður tosað um oljuvinnu við Føroyar. Hugsa vit okkum at varðveita eina fiskivinnu við Føroyar, sum er áhugaverd at vera í, eina vinnu sum skal klára seg í kapping við oljuvirksemi, um hendan kemur, so er neyðugt, at vinnan gevur peningaligt avlop, góða inntøku til tey, ið starvast har, og verður áhugaverd at seta pening í. Hetta mugu vera fortreytirnar, um vit ikki skulu missa tað góða fólkið úr vinnuni. Hetta gerst ikki bara við at fáa frá umsetiligheit, men onnur tiltøk eru eisini neyðug, sum t.d. ein fiskifloti, ið fremur tað veiðitrýst, sum stovnarnir tola. Landsstýrismaðurin í fiskivinnumálum fer eisini eftir setnjar í samgongini at leggja uppskot til broytingar í lógini um mánaðarligan minstavinning til skrásettar útróðrarmenn fyri løgtingið.

Uppskotið hevur verið til ummælis hjá Fiskivinnustarvsnevndini. Nevndin hevur á fundi hin 24. juli viðgjørt uppskotið og tilfarið, sum liggur til grund fyri uppskotinum. Nevndin hevur onga viðmerking til málið í løtuni, men ynskir at gera viðmerkingar sínar aftaná, at málið er sent løgtinginum.

Mett verður ikki, at broytingarnar, sum her verða skottnar upp, fara at broyta nakað um kostnaðin av at umsita lógina um vinnuligan fiskiskap.

Mælt verður løglinginum til at samtykkja uppskotið.

Viðmerkingar til tær einstøku broytingarnar

ad. 1) Fyri fiskifør yvir 15 BRT faru veiðiloyvini at verða latin uttan ávíst áramál, men fyri fiskifør undir 15 tons verður mælt til at broyta 2 ár til 5 ár við atliti at parti av tilnæmingum frá vinnuni.

ad. 2) Fyri at skip, sum ikki eru undir fiskidagaskipan (djúpvatnstrolarar og serloyvir), skulu fáa møguleika at virka undir eini samanlegging av veiðiloyvum og umsetiligum fiskirættindum, so má tað vera møguligt at áseta hjáveiðuna í tonsum. Heimild er fyri at áseta fiskidagaskipan fyri skip við serloyvum (§ 9, stk. 1, pkt. 3), men § 27 forðar lemmatrolarum yvir 1000 tons at virka undir fiskidagaskipan. Hendla broytingin saman við heimildum landsstýrisins annars ger, at djúpvatnstrolarar kunnu virka eftir lógini, soleiðis sum nú mælt til at broyta.

ad. 3) Rætting, sum fylgir broytingini undir 9).

ad. 4) Her verður ásetingin »ella til fiskiskap á fjarleiðum samhæri sínámillum fiskiveiðiavtalu« sett inn. Í seinasta broyting varð lagt aftrat, at landsstýrið fyri uppsjóvar fiskasløgum ella viðvíkjandi rækjuveiðu og veiðu í altjóða sjógvi kann gera undantak frá kravinum um somu fiskiorku. Mælt verður til, at hetta eisini skal galda fiskiskap á fjarleiðum.

ad. 5) Skotið verður upp, at fiskidagar kunnu umsetast frítt í 15 ár í hvørjum undirbólki lýstur í § 29, stk. 1, sum landsstýrið ásetir, samstundis sum ásetingin um 5 ára tíðarskeið dettur burtur.

Tað fer tó framhaldandi at vera loyvt at leiga ella læna dagar millum høvuðsbólkar, tá 3 mánaðir eru eftir av fiskiárinum; hetta verður tó ikki galdandi fyri at læna og leiga dagar frá høvuðsbólki 5 (útróðrarbátar undir 15 tons).

ad. 6) Við broytingini í stk. 1 kunnu fiskidagar umsetast í hvørjum í 15 ár. Tí fellur grundarlagið fyri ásetingini í stk. 2 og stk. 3 burtur.

ad. 7) Í § 15, stk. 2 verður 5 ára skeiðið broytt til 15 ár, roknað frá 1. september 1997.

ad. 8) Skotið verður upp at broyta tíðarfreistina hjá Fiskirannsóknarstovuni og Stovnsrøktarnevndini til 15. juni og at leingja freistina hjá løgtinginum til 15. august.

ad. 10) Uttan at broyta núverandi býti í lógini verður mælt til at gera býtið vegleiðandi.

ad. 11) Fiskidagatalið er sett niður 12½%, og býtið millumi undirbólk 4A og 4B er broytt samsvarandi við, hvussu tørvur er á fiskidøgunum í hesum bólkum.

ad. 12) Endamálið við broytingini er at loyva verandi trolbátum at verða skiftir út við annað fiskifar í sama bólki uttan at trolloyvið verður inndrigið.

ad. 13-15) Í revsireglunum og í heimildum fiskiveiðieftirlitsins er § 9 viðkað, uttan at hesar broytingar eru gjørdar. Tað er tí neyðugt at hava hesa broyting við nú.

1. viðgerð 1. august 1997. Uppskotið varð beint í vinnunevndina, sum 4. august 1997 legði fram soljóðandi:

Álit

Málið varð lagt fyri løgtingið av landstýrinum 30. juli 1997 og eftir 1. viðgerð 1. august 1997 beint í vinnunevndina.

Vinnunevndin hevur viðgjørt uppskotið og býtt seg í ein meirluta og tríggjar minnilutar.

Meirlutin (Jørgen Niclasen, Atli Hansen, Óli Jacobsen og Álvur Zachariasen) tekur undir við uppskoti landsstýrsins tó við smærri broytingum. Meirlutin leggur dent á, at skipanarnevndin í komandi tíð kemur við einum felags tilmæli.

Meirlutin heldur, at niðurskurðurin í fiskidøgum saman við øðrum tiltøkum førir fram ímóti, at endamálini í lógini verða rokkin.

Við øðrum tiltøkum verður m.a. sipað til øktar friðingar av gýtingarleiðum, og meirlutin heitir á landsstýrið um at herða eftirlitið og fáa meira samsvar millum brúktar dagar og mynstraðar dagar.

Í verandi lóg er umsetiligheit loyvd í upp til 5 ár. Meirlutin tekur undir við, at hesi 5 árini verða broytt til 15 ár. Við eini avmarking í umsetiligheit upp á 15 ár er altíð møguligt hjá politiska myndugleikanum at grípa inn, um umsetiligheitin av fiskidøgum skuldi vísa seg at hava óvæntaðar, óhepnar avleiðingar við sær. Hetta er eisini í samsvari við § 3, stk. 2 í lógini, har tað stendur: »Fiskirættindi latin sambært hesi lóg veita ikki einstøkum bólkum ella einstaklingum ognarrætt«.

Meirlutin heldur ikki, at broytingaruppskot landsstýrisins til § 14, 1. stk., er nóg greitt orðað. Uppkotið kann geva ta fatan, at 15 ára skeiðið byrjar 1. september 1997 og so endar um 15 ár uttan mun til, um dagarnir verða umsettir av nýggjum ella ikki.. Hetta kann neyvan vera hugsanin. Fiskidagar, sum verða umsettir, skulu til eina og hvørja tíð verða umsettir fyri 15 ár. Eisini heldur meirlutin, at tað eigur at staðfestast í lógini, at dagar ella kvotur, sum eru umsettar, eisini skulu hava eitt tíðarskeið uppá 15 ár frá tí, henda lógin kemur í gildi.

Í § 15 stk. 2 hevur landsstýrið í uppskotinum ikki broytt 5 ára skeiðið í 2. pkt til 15 ár, og eigur hetta at verða gjørt.

Landsstýrið skjýtur upp, at fiskidagar fyri komandi fiskiár verða kunngjørdir í seinasta lagi 15. august. Meirlutin heldur, at skákbráið er ov stutt, og skjýtur upp 18. august.

Meirlutin mælir løgtinginum til at samtykkja uppskot landstýrsins við omanfyrinevndu broytingum og setir fram soljóðandi

broytingaruppskot

1) Í § 1, nr. 5 verður § 14, stk. 1, 1. pkt. orðað soleiðis: »Fiskidagar kunnu umsetast frítt í 15 ár frá tí degi, teir seinast eru umsettir innanfyri hvønn undirbólk ásettir sambært § 29, stk. 1 eftir nærri reglum, sum landstýrið ásetir.«
2) Í § 1 verður nr. 6 orðað soleiðis:
»§ 14, stk. 2 verður orðað soleiðis:
»Hjá felløgum og einstaklingum sum hava útvegað sær fiskidagar innan 1. september 1997 verður 15 ára skeiðið roknað frá hesum degi«
3) Nýtt nr. 7 verður soljóðandi: »§ 14, stk. 3 verður strikað« Nr. 7 verður hereftir nr. 8.
4) Í § 1 verður nr. 7 nú 8 orðað soleiðis:
§ 15, stk. 2 verður orðað soleiðis:
»Kvotur ella partar av kvotum kunnu ikki latast øðrum í meira enn 15 ár frá tí, tær seinast eru umsettar. Verður kvota latin øðrum í meira enn 15 ár, fellur hon til felagskvotuna hjá avvarðandi skipabólki. Fyri kvotur umsettar innan 1. september 1997 er reglan í § 14, stk. 2 galdandi« nr. 8-15 verða hereftir nr. 9-16.
5) Í § 1, nr. 8 nú nr. 9 verður »15. august« broytt til »18. august«.

Minnilutin (Henrik Old) førir fram: So upprann tann dagur, at man í Føroyum aftur fór at býta rættin til at fiska út aftur á nakrar fáar hendur, eftir at hesin rættur hevur ligið hjá tí einstaka, heilt síðan bátsbandið varð avtikið í 1865.

Nú skal pengapungurin gera av, hvør skal hava rættin at fiska á grunninum.

Valla hava øll í samgonguni hugsað nóg væl, hvat henda stóra broyting inniber. Henda stóra kolvelting í rættinum hjá tí einstaka føroyinginum at virka í landinum verður snildisliga lirkað inn í eitt uppskot um regulering av fiskidagaskipanini.

Tað, at henda nýðingsgerð verður gjøgnumførd í eini samgongu við Fólkaflokkinum, undrar ongan, men at tað skuldi henda saman við Sambandsflokkinum og Sjálvstýrisflokkinum tykist løgið, teir sum siga seg verja rættin hjá tí einstaka at virka. Sigast má, at »Hvokkin er hann Grímur á Skóg«. Eftir øllum at døma ætlar man blint at góðtaka tað største rán á ognarrættin hjá tí einstaka føroyinginum, sum framt er í hesari øld.

Eitt alment útlutað loyvi til at reka fiskiskap ella aling eigur, tá hetta loyvið verður slept, at koma tí almenna/fólkinum til góðar.

Ein hevur undrast á, at Fólkaflokkurin hevur góðtikið ta viðferð, teir hava fingið frá løgmanni, nú seinast landsstýrismaðurin í fiskivinnumálum í løgmansrøðuni. Svarið uppá hettar fólkaflokstolsemið hava vit nú. Trongdin eftir at fáa sett í verk umsetiligar kvotur hevur gjørt, at flokkurin hevur góðtikið viðferðina og solospælið hjá løgmanni.

Í grein 2 í lógini um vinmuligan fiskiskap stendur so vakurt »Livandi tilfeingi á føroysku landleiðini og tey rættindi, føroyska heimastýrið við samráðingum hevur rokkið ella eftir altjóða rætti eigur uttan fyri føroysku landleiðimar, eru ogn Føroya fólks«.

Eftir øllum at døma ætlar samgongan at lata hetta standa í lógini, sjálvt um rætturin til tilfeingið nú skal býtast út á nakrar fáar – útvaldar hendur. Eftir royndunum úr Íslandi er tað alt, sum bendir á, at tað verður útjaðarin, ið í longdini tapir. – Í Íslandi er gongdin týðilig, tann veiki parturin (útróðurin) og einstaklingar, sum ikki hava nógv at standa ímóti við, liggja eftir á, meðan ognarrætturin verður samlaður á fáum hondum. Týðiligt dømi um hetta er nógva sølan av biliguin útróðrarbátum úr Íslandi til Føroyar. Spennandi verður at síggja, um veljarar Sambands- og Sjálvstýrisfloksins fara at góðtaka hesa beistagerð. Vónandi gongur ikki long tíð, til teir koma at standa sína roynd yvir fyri veljaranum.

Eitt má tó sigast. Fólkaflokkurin hevur vunnið sín størsta politiska sigur nakrantíð, hetta at taka rættin frá tí einstaka at virka og lata hann á nakrar fáar útvaldar hendur – sjálvandi væl stuðlaðir av Føroya Banka, sum við síni framferð í fiskavirkisgini á landi hevur lagt stóra orku í at jarðleggja ávís økir í landinum við at leggja sína køldu hond á bestu virkini í landinum.

Ein spurningur til landsstýrissamgongurna má vera, um ætlanin er, at landskassin framhaldandi skal gjalda inntøkutrygdina, eftir at fiskirættindini eru seld einstaklingum.

Eru yrkisfeløgini innan fiskivinnuna hoyrd, og hvat er støða teirra til kolvellingina í eigaraviðurskiftinum innan fiskivinnuna. Royndirnar úr Íslandi vísa, at langt áðrenn 15 ár eru farin, er so nógvur kapitalur uppá spæl í keypi og sølu, at ikki vendist aftur.

Umboð Javnaðarfloksins í vinnunevndini vísti fleiri ferðir á, síðsta summar og heyst, at skipanin fyri útróðrarbátar undir 15 tons var ónýtilig og kom at føra til, at bátur noyddust at nýta fiskidagarnar soleiðis, at teir vóru verandi undir skipanini við íløgustaðli og somuleiðis í minstulønarskipaniini fyri útróðrarmenn. Soleiðis bleiv gongdin, sjálvt um einstakir samgongumenn síðsta heyst lovaðu, tá uppskot Javnaðarfloksins um frítt at fiska fyri hendla bólk var til viðgerðar, at bátarnir skuldu fáa fleiri fiskidagar í november síðsta ár. Hesir fiskidagar eru nústani býttir út við teimum fylgjum, at tá fiskiárið endar nú 31. august, loypa fleiri dagar av, sjálvt um hesin bólkur mesta partin av árinum hevur manglað fiskidagar. Hetta bevur so aftur ført til ta meirnýtsluna í inntøkutrygdini, sum landsstýrismaðurin boðaði frá undir 1. viðgerð.

Í frágreiðingini frá skipanarnevndini er nógv áhugavert tillar um gongdina í fiskiskapinum o.a. Sjálvt um nevndin hevur býtt seg í tríggjar partar, so er tilfarið, ið innsamlað er, ógvuliga nyttugt. Tað einasta, teir tríggir partarnir eru samdir um, er, at setast skal í verk skipan við umsetiligum fiskidøgum.

Hetta verður sagt uttan samtíðis at boða frá, at veiðutrýstið av hesum verður økt munandi. Eitt er, at umboðini fyri vinnuna ikki gera vart við tað, men at umboðini fyri fiskivinnuuntsitingina einki siga um veiðutrýstið, er óskiljandi. Lesa við niðurstøðuna hjá Fiskirannsóknarstovuni á síðu 37 í tilmælinum, stendur í næsta punktum: *«Í nevndini tykist annars at vera semja um, at ein fortreyt fyri eini skilagóðari minking av veiðutrýstinum var, at fiskidagarnir vóru fult umsetiligir innan bólkarnar. Hesum taki eg undir við». Hesi vóru orðini hjá sjálvan stjóranum á Fiskirannsóknarstovuni.*

Minnilutin (Henrik Old) má ásanna, at tá Fiskirannsóknarstovan er komin til hesa niðurstøðu, so er øll vón úti fyri einum sakligum orðaskifti um fiskidagar og veiðitrýst. Umsetiligir fiskidagar er (lig við) effektivari nýtsla av fiskidøgum, og effektiv nýtsla av fiskidøgum er tað sama sum størri veiðitrýst.

Tað er nakað grundleggjandi galið í Fiskivinnuumsitingini og á Fiskirannsóknarstovuni, tá ein er komin til ta niðurstøðu, at fult umsetiligir fiskidagar mitrka um veiðitrýstið. Eitt lætt skiljandi dømi kann vera, at tveir av eldru pantrolarunum við 600 HK maskinu ikki nýta sínar dagar, tað kann vera av veðri, maskintrupulleikum ella øðrum, men selja ella leiga teir til tveir bátar við 1200 HK, so vil sjálvandi veiðitrýstið økjast samsvarandi. Tað vera altíð tey mest effektivu og mest viknu skipini, sum koma at mangla fiskidagar, so sjálvandi økist veiðitrýstið við størri umsetiligheit.

Minnilutin (Henrik Old) kann ikki taka undir við broytingunum um umsetiligan fiskikvotur og fiskidagar út frá frammanfyri nevndu grundgeving. Sjálvt ikki tann fyrimunur, at nú sleppa fleiri framat teimum kvotum á fjarleiðum, ið ávísar bygdir nærmast hava átt. Sjálvt ikki hetta kann fáa minnilutan at taka undir við hesum. Tær smærru teknisku broytingarnar taka vit undir við. Umboð Javnaðarfloksins loyvir sær enn einaferð at koma við broytingaruppskoti til punkt 11 í uppskoti landsstýrisins, ið viðvíkir bólki 5, útróðrarbátar undir 15 BRT. Hugsað eigur at verða um, at hesir bátar eru undir reglum um minstulon til útróðrarmenn, umframt tær heimildir í lógini um vinnuligan fiskiskap annars veita landsstýrismanninum til aðrar avmarkingar.

Umboð Javnaðarfloksins í vinnunevndini svaraði uppá fyrispurning frá pressuni um fiskidagaskipanina, at 30% niðurskurður í høvuðsheitum eftir einum ári tolir samfelagið ikki. Tí varð skotið upp at taka niðurskurðin yvir 2 ár. Somuleiðis sást gongdin í vinnuni gjøgnum árið, um 30% hevði verið tað rætta. Men eftir sum samgongan nú setir í verk frítt umsetiligar fiskidagar, er grundarlagið og útgangsstøðið fyri eini sakligari viðgerð av fiskidagaskipanini.

Vit hava frammanfyri víst á nøkur dømi sum grund fyri, at vit ikki kunnu vera við í meirlutanum.

Tí setir minnilutin (Henrik Old) fram soljóðandi

broytingaruppskot

Í nr. 11 verður orðingin »Bólkur 5 Útróðrarbátar undir 15 BRT á húkaveiðu 23625 fiskidagar« broytt til »Bólkur 5: Útróðrarbátar undir 15 BRT á húkaveiðu fiska frítt«.

Minnilutin (Heini O. Heinesen) førir fram: Eftir fund í løgtingsins vinnunevnd leygardagin 3. august er tað komið fram, at meirilutin ikki er sinnaður at broyta nakað av týdningi í uppskotinum frá landsstýrinum. Tá hetta er støðan, er greitt, at minnilutin ikki kann taka undir við uppskotinum.

Landsstýrisuppskotið er beinleiðis í strið við § 2 í lógini um vinnuligan fiskiskap. Har stendur: »*Livandi tilfeingið á føroyska landleiðunum og tey rættindi, føroyska heimastýrið við samráðingum hevur rokkið ella eftir altjóða rætti eigur uttan fyri føroyska landleiðirnar, eru ogn Føroyat fólks.*«

Lógaruppskotið frá landsstýrismannininum í fiskivinnumálum, John Petersen, er einki minni enn ein undirfundig *ognartøka* til fyrimuns fyri nakrar fáar smartar vinnulívsmenn. Skotið verður upp, at fiskidagaskipanin skal verða umsetilig í 15 ár. Tað vil siga, at rætturin til at fiska á Føroyagrunninum kann verða seldur í 15 ár. Hví 15 ár? Landsstýrið kundi tað sama skriva 200 ár. Tað skal ikki stórur fantasiur at hugsa sær, at her vendist ikki aftur, tá tú ert farin at selja fiskidagar á sama hátt sum fastan eigindóm. Tað kundi eisini verið áhugavert at fingið at vita, um hesir, sum nú koma at hava einkarrætt at fiska á Føroyagrunninum, eisini fara at yvirtaka tær 150 til 200 milliónirnar í íløgustuðli og inntøkutrygd, sum í dag standa á landsins fíggjarlóg? Tað verður eisini skotið upp at býtið í lógini § 28 bert skal vera rættleiðandi. Hetta er tað sama sum at avtaka hetta býtið. Hvat verður tað næsta, vit fáa borið niðan í tingið frá hesum landsstýrinum? Tá lógirnar bert eru rættleiðandi, er hetta tað, sum verður kallað fyri »betongjura«??

Tá eg seinast tók undir við einum parti av landsstýrisuppskotinum, var hetta bert av einari grund, og hon var, fyri at tey trolfríu økini, sum standa í § 9a, ikki skuldu verða tikin úr lógini, sum landsstýrið tá hevði skotið upp.

Nú sigur sama landsstýrið, at friðingarnar skulu verða standandi. Hetta er helst tí, tað er valár. Teir tora ikki annað.

Nú hevna teir seg inn á § 28, stk. 2, í staðin fyri býtið í lógini. Hetta býtið er besta trygd fyri, at ikki verður tikið meira úr stovninum, enn tann veikasti veiðihátturin klárar at fiska. Hetta er í sjálvum sær ein góð stovnsrøkt. Býtið varð sett inn í sjálva lógina í sínari tíð fyri at tryggja, at húkaveiðan eisini skuldi hava ein møguleika at yvirliva.

Tað verður so nógv tosað um, at gera fiskidagarnar meira umsetiligar. Hetta kemur í sjálvum sær at økja munandi um veiðitrýstið. Tað er ikki møguligt at umseta fiskidagar á sama hátt sum fiskikvotur. Eg skal bert taka eitt dømi úr tilmælinum frá »Skipanarnevndini«. Tað stendur á síðu 33 í tilmælinum frá nevndini, har Andras Kristiansen og Elmar Højgaard mæla til at skerja fiskidagatalið við 15%. Samstundis sum teir siga, at »*skipabólkarnir fara at hava úr 18% og upp í 70% eftir ar teimum tilhatoðu døgunum, tá fiskiárið er liðugt*«.

Hetta sigur mær so mikið, at veiðitrýstið verður økt við í minsta lagi 3% og í ringasta lagi við ikki færri enn 55%, um so er, at umsetiligheitin virkar 100%. Hetta er tað, sum skrivað stendur.

Nú skal tað ikki skiljast soleiðis, at eg ikki kann taka undir við einum parti av tí, sum teir mæla til í sínum samandrátti. Her hugsi eg serliga um tað, sagt verður í punkti 5. *»at skipanin við teinum innan og ytru fiskidagaleiðunum verður avtikin«*. Eg kann eisini taka undir við punkti 2 *»at friðu gýtingarleiðirnar hjá upsanum í gýtingartíðini«*. Men hetta finst ikki í uppskotinum frá landsstýrinum. Har eru í hvussu so er ongar avmarkingar av fiskiskapinum. Landsstýrið tekur heldur ikki tað til eftirtektar, sum ein samd vinna mælir til.

Niðurstøðan av tí, sum framkomið er, er, at fiskidagaskipanin slettis ikki avmarkar fiskiskapin. Partrolaraflotin fiskar frítt. Djúpvatnstrolararnir eru ikki undir skipanini við fiskidøgum, tað sær út til ikki at skapa nakran trupulleika.

Tað einasta, sum fiskidagalógin hevur skapt síðani hon kom í gildi, er ein stórur burtivasi í útróðrarflotanum, sum kanska ongantíð verður uppaftur rættaður.

Tað eru serliga bátarnir niðan fyri 15 tons, sum samhært landsstýrismanninum og umsitingini eru tann stóra hóttanin ímóti fiskastovnunum. Her hevur landsstýrismaðurin útskrivað eina fiskikapping í kunngerð. Hesin bólkurin hevur í hvussu so er fiskað umleið minni, um hann ikki var undir hesi skipan.

Tað einasta, sum regulerar fiskarítt, eru tey trolfríðu økini og býtið í § 28, stk. 2. Tað vil siga, um lógin verður umsitin við skili.

Mimilutin (Lasse Klein) kann taka undir við størri umsetiligheit fyri fiskiflotan, men ivast stórliga í, um tað er rætt at fara undir hetta, áðrenn spurningurin um samansetingina av veiðiflotanum er avgreiddur. KrF heldur, at fyrst av øllum eiga vit at gera av, hvussu veiðiflotin skal vera samansettur, og at broyta býtið millum trol og húkaveiði. Tá ið tað er gjørt, ber til at økja um umsetiligheitina.

Eisini heldur KrF at útróðrarbátar undir [5 BRT] skulu hava frítt at fiska, tí at teir frammanundan eru avmarkaðir av veðri og streymi og sostatt avskornir frá at fiska stórt meira enn í mesta lagi 100 fiskidagar um árið.

Mimilutin (Lasse Klein) skilir heldur ikki, hví landsstýrinum í punkt 12 í 1. grein skal verða heimilað at gera undantak fyri trolbátum til, at verandi fiskiloyvi kann verða flutt til annað fiskifar í sama bólki. Her er ikki talan um at minka um nakað trýst á fiskastovnarnar, men heldur øvugt at økja um trýstið og varðveita sama tal av trolbátaloyvum.

Tí kann mimilutin (Lasse Klein), sum er, ikki taka undir við uppskoti landsstýrisins og mælir løgtinginum frá at samtykkja tað.

2. viðgerð, 6. august 1997 legði Henrik Old, løgtingsmaður, fram soljóðandi:

B r o y t i n g a r u p p s k o t

Í § 1 verða nr. 5, 6 og 7 strikað, og nr. 8-15 verða hereftir nr. 5-12.

6. august 1997 legði Jákup Joensen, løgtingsmaður, fram soljóðandi:

Broytingaruppskot

Broytingin snýr seg um:
1. Møguleikin at umseta fiskidagar verður óbroyttur 5 ár í senn, samsvarandi galdandi lóg.
2. Skipanin við innaru og ytru fiskidagaleiðini verður avtikin.
3. Friðing av gýtingarleiðunum hjá toski, hýsu og upsa í gýtingartíðindi verður tikin við í lógina, eins og hinar økisfriðingarnar sambært § 9a.

Viðmerkingar

Viðvíkjandi 1.

Upprunaliga grundgevingin fyri fríari umseting av fiskidøgum hevur verið tann, at hetta var fortreytin fyri neyðugari tillaging av flotanum til veiðitilfeingið og harvið fortreytin fyri løsnemi í skiparakstrinum.

Nú verður lýst fram, at fríari umseting av fiskidøgum er almeyðug fyri at minka veiðitrýstið.

Hetta er skeivt. Veruleikin er tvørturímóti tann, at fríari umseting av fiskidøgum ferð at savna fiskidagarnar á hendur teirra, sum vegna dugnaligan rakstur ella vætvild P/F Føroya Banka av sonn orsøk hava pening tøkan til keyp av fiskidøgum. Tann tøki peningurin stavar sostatt frá dugnaskapi teirra fiskidagaáunara, sum hava megnað at fáa størst møguligu nøgdir upp úr sjónum hvønn fiskidag.

Tað er eyðsæð, at stórur partur av ásettu fiskidøgunum á hesum dugnahondum fer at leggja munandi støri veiðitrýst á fiskastovnarnar. Hetta er vandaleið, tí skipanarnevndin vísir á, at veiðitrýstið er alt ov stórt, sum er.

Aðrir spurningar, verdir eru at hava í huga í hesum sambandi, eru:
1. Hvussu ætlar politiski myndugleikin at fremja sína stovnsrøktarskyldu við t.d. minking av samlada fiskidagatalinum sambært lógini um vinnuligan fiskiskap, aftaná at sami myndugleiki hevur eggjað fiskidagaánarum at keypa sær flest møguligar fiskidagar fyri stórar pengingaligar upphæddir – við endurgjaldið úr landskassanum kanska.
2. Hvussu ætlar politiski myndugleikin, sambært skyldum sínum í lógini um vinnuligan fiskiskap, at gagnnýta tilfangið á føroysku landleiðini á samfelags gagnligasta hátt, t.d. við øktum fiskidagatali til ein til tað minkaða tilfeingið tillagaðan fiskiflota – við at økja fiskiflotan aftur kanska?
3. Politiski myndugleikin kann lesa í blaðunum, at partur av vinnuni fegnast um fríari umseting av fiskidøgum, tí hetta vil savna fleiri fiskidagar á færri hendur og gera tað møguligt hjá fiskavirki at gera einkaravtalu við t.d. innrar av 15.000 fiskidøgum, og hjá sølufyritøku at gera einkarrættaravtalu við viðkomandi fiskafrumleiðara -- alt undir neyvari stýring fíggingarfelagsins sjálvandi -- banka ella fjartaksgrunn. Ætlar politiski myndugleikin kanska at taka undir við hesum avleiðingum av fríari fiskidaga umseting og lóggeva til fruma fyri monopolkendum umstøðum í landsins høvuðsvinnu?

Viðvíkjandi 2.

Í tí fyrsta tilmælinum frá skipanarnevndini, dagf. 8. februar 1996, verður víst á, at eitt av stóru brekunum við eini fiskidagaskipan er tað, at illa ber til at verja ávísar fiskastovnar móti ovfiskin, og hetta er samtykt til fulnar.

Sum eina roynd at verja virðismiklasta fiskastovn okkara, toskastovnin, móti ovfisking setti landsstýrið eftir tilmæli frá skipanarnevndini í verk eina skipan við innaru og ytru fiskidagaleið, sum eina royndt at bera fiskiskapin á onnur fiskasløg enn toskin. At henda roynd er miseydnað, er eisini samtykt til fulnar.

Tíverri má harafturat staðfestast, at skipanin hevur fört til ovurhonds stóran vokstur í fiskidagatalinum og harvið økt um veiðutrýstið. Skipanin tænir ongum gagnligum endamáli og eigur sostatt at verða avtikin.

Viðvíkjandi 3.
Tað er roynd lutur, at viljin til eftirlit við fiskidagaskipanini higartil hevur verið lítil og eingin. Hetta ger skipanina bæði skaðiliga og vandamikla, og eingin vón er um nakran batu á hesum øki við verandi umsiting. Sama kann sigast um viljan til at fremja ta neyðugu stovnsrøktina við kunngerð frá landsstýrinum, og heldur ikki her er vón um broyting. Tessvegna er neyðugt, at stovnsrøktarlriðingarnar verða settar í lógina sjálva, sbr. greinini 9a í galdandi lóg.

Samsvarandi hesum verður sett fram soljóðandi

B r o y t i n g a r u p p s k o t

1) Í § 1 verður nýtt nr. 1 soljóðandi: »§ 4, stk. 4 og 5 verða strikað. Stk. 6 verður hereftir stk. 4. Nr. 1-7 verða hereftir nr. 2-8.«
2) Í § 1 verður nr. 5 nú nr. 6 soljóðandi: »§ 9 nr. 1 verður strikað, nr. 2-11 verða hereftir nr. 1-10.«
3) Í § 1 verður nr. 6 nú nr. 7 soljóðandi. »Í § 9a verður skoytt uppí:
»m) Í tíðarskeiðinum frá 31. januar til 31. mars, báðar dagar íroknaðir, er ikki loyvt at veiða við nøkrum veiðihætti, tó er snelluveiða eftir upsa undantikin, millum 3150 rættvísandi úr Barðinum (62°08'48"N, 07°26'00"V) og 360° rættvísandi úr Mýlingi (62°18'11"N, 07°12'30"V) frá 12 fjórðinga markinum út á linjur drignar millum hesi støð:
1. 62°32'00"N, 08°15'00"V
2. 62°36'00"N, 08°00'00"V
3. 62°43'00"N, 07°30'00"V
4. 62°46'00"N, 07°12'30"V
n) Í tíðarskeiðinum frá 15. januar til 15. mai, báðir dagar íroknaðir, er ikki loyvt at veiða við troli og gørnum millum 3600 rættvísandi úr Mýlingi (62°18'11"N, 07°12'30"V) og 360° rættvísandi úr Ennibergi (62°23'49"N, 06°33'38"V) frá 12 fjórðinga markinum úr á linjur drignar millum hesi støð:
1. 62°46'00"N, 07°12'30"V
2. 62°48'00"N, 07°00'00"V
3. 62°50'00"N, 06°33'38"V
o) Í tíðarskeiðinum frá 15. februar til 31. mars, báðir dagar íroknaðir, er ikki loyvt at veiða við nøkrum veiðuhátti, tó er snelluveiða eftir upsa undantikin uttan fyri 12 fjórðinga markið, millum linjur drignar millum hesi støð:
1. 61°40'00"N, 08°25'00"V
2. 61°54'00"N, 08°40'00"V
3. 61°54'00"N, 07°25'30"V
4. 61°42'30"N, 07°10'00"V
5. 61°40'00"N, 07°16'00"V
p) Í beinleiðis veiðu eftir upsa við snellu, sum loyvt á økjunum m og o, má hjáveiða av toski ikki fara upp um 10%.
4) Í § 1 verður nr. 7 nú nr. 8 strikað.
5) Í § 1 nr. 12 verður soljóðandi: »§ 29, stk. 3 verður strikað. § 29, stk. 4-9 verða hereftir § 29, stk. 3-8.

6. august 1997 løgdu tingmenninir Atli Hansen, Óli Jacobsen og Álvur Zachariasen fram soljóðandi broytingaruppskot í staðin fyri broytingaruppskot meirlutans í álitinum:

b r o y t i n g a r u p p s k o t

1) Í § 1 nr. 5 verður § 14 stk. 1,1. pkt. orðað soleiðis: »Fiskidagar kunnu umsetast frítt í 10 ár frá tí degi teir seinast eru umsettir innanfyri hvønn undirhólk ásettir sambært § 29 stk. 1 eftir nærri reglum, sum landstýrið ásetir.«
2) Í § 1 verður nr. 6 orðað soleiðis:
»§ 14, stk. 2 verður orðað soleiðis:
»Hjá felløgum og einstaklingum sum hava útvegað sær fiskidagar innan 1. september 1997 verður 10 ára skeiðið roknað frá hesum degi«
3) Í § 1 verður nýtt nr. 7 orðað soleiðis:
»§ 14 stk. 3 verður orðað soleiðis:
»Fiskidagar, sum eru umsettir í einum fiskiári fyri ávíst tíðarskeið, skulu fylgja vøkstri og niðurskurði í sama mun, sum ásetingin í § 29 fyri hvørt fiskiár broytist«. Nr. 7 verður hereftir nr. 8
4) Í § 1 verður nr. 7 nú nr. 8 orðað soleiðis:
§ 15 stk. 2 verður orðað soleiðis:
»Kvotur ella partar uv kvotum kunnu ikki latast øðrum í meira enn 10 ár frá tí tær seinast eru um-

settar. Verður kvota latin øðrum í meira enn 10 ár, fellur hon til felagskvotuna hjá avvarðandi skipabólki. Fyri kvotur umsettar innan 1. september 1997 er reglan í § 14, stk. 2 galdandi«

5) Í § 1 verður nýtt nr. 9 orðað soleiðis:
»Nýtt § 15 stk. 3 verður orðað soleiðis:
Kvotur, sum eru umsettar í einum fiskiári fyri ávíst tíðarskeið, skulu fylgja vøkstri ella niðurskurði í sama mun, sum heildarkvotan broytist hvørt ár.« Nr. 8-15 verða hereftir nr. 10-17

6) Í § 1 nr. 8 nú nr. 10 verður »15. august« broytt til »18. august«.

6. august 1997 legði Heini O. Heinesen, løgtingsmaður, fram soljóðandi

Broytingaruppskot

Í § 1 verður nýtt nr. 5 soljóðandi »Í § 9 a, pkt. e) verða orðini »1. apríl til 31. januar« broytt til »1. januar til 31. desember«. Nr. 5-15 verða hereftir nr. 6-16.

Broytingaruppskot fra Henrik Old til § 1, nr. 11 fall við 11-1-19 atkvøðum. Broytingaruppskot frá Henrik Old til § 1, nr. 5, 6 og 7 fall við 11-1-19 atkvøðum. Broytingaruppskot frá Heina O. Heinesen til § 1 fall við 7-6-18 atkvøðum Broytingaruppskot frá Jákup Joensen til § 1 fall við 5-9-17 atkvøðum. Broytingaruppskot frá Atla Hansen, Óla Jacobsen og Álvi Zachariasen til § 1, í staðin fyri broytingaruppskot meirihlutans í vinnunevndini, samtykt við 16-3-12 atkvøðum. § 1 soleiðis broytt samtykt við 16-2-13 atkvøðum. § 2 samtykt uttan atkvøðugreiðslu. At málið soleiðis samtykt kann fara til 3. viðgerð samtykt við 17-1-13 atkvøðum.

3. viðgerð 9. august 1997. Løgtingslógaruppskotið sum samtykt við 2. viðgerð endaliga samtykt við 15-1-9 atkvøðum.

Løgtingslóg nr. 133 frá 9. august 1997.
F.L. j.nr. 1400-8/91

4 Løgtingslóg um grunn fyri vakstrarhús og grønmetisframleiðslu

Ár 1997, mikudagin 30. juli legði Ivan Johannesen, landsstýrismaður, vegna landsstýrið, fram soljóðandi:

Uppskot
til
løgtingslóg um grunn fyri vakstrarhús og grønmetisframleiðslu

§ 1. Grunnurin hevur til endamáls at veita lán og studning til vakstrarhús og uttandura grønmetisframleiðslu.

§ 2. Grunnurin er undir eftirliti landsstýrismansins.

§ 3. Stýrið grunsins er Føroya Jarðarráð.
Stk. 2. Landsstýrismaðurin ásetir nærri reglur í kunngerð um umsiting grunsins.

§ 4. Vakstrarhúsgrunnurin, sum varð settur á stovn við løgtingsfíggjarlóg 1984/85 verður avtikin og ogn grunsins verður flutt grunni fyri vakstrarhús og grønmetisframleiðslu, og er hetta stovnsfe grunsins saman við játtanum á fíggjarløgtingslógum.

§ 5. Grunnurin kann veita hesi lán:
1. Stuttfreistað lán til keyp av grundøki.
2. Byggilán at byggja ella umbyggja nýggj vakstrarhús, avmarkað til ta upphædd, ið grunnurin veitir sum veðskuldarlán.
3. Veðskuldarlán til nýggj vakstrarhús.

4. Veðskuldarlán til keyp av vakstrarhúsum.
5. Veðskuldarlán til endurnýggingar og umbyggingar av vakstrarhúsum.

Stk. 2. Grunnurin kann veita fylgjandi studningar.

1. Studul til nýbyggung
2. Studul til umbygging
3. Studul til gransking og vørumenning
4. Studul til marknaðarføring
5. Studul til orkusparandi tiltøk

Stk. 3. Landsstýrismaðurin ásetur nærri reglur og treytir fyri lán- og studulsveitingunum.

§ 6. Roknskaparár grunsins er álmanakkaárið.

Stk. 2. Roknskapirnir sambært stk. 1 verða grannskoðaðir av løggildum grannskoðara.

Stk. 3. Grannskoðaðu roknskapirnir verða sendir landsstýrismanninum við frágreiðing og viðmerkingum frá Føroya Jarðarráði.

§ 7. Grunnurin eru leysur av øllum skatti og avgjøldum til land og kommunu.

Viðmerkingar

Vakstrarhúsgrunnurin, sum varð settur á stovn í 1984/85, hevur uhgantíð havt greiðar reglur at arbeiða eftir, og hava løglingsgrannskoðararnir funnist at hesum ár undan árið, sí hjálagda skjal.

Landsstýrismaðurin í vinnumálum hevur tí gjørt av at seta á stovn ein veruligan grunn, sum kann stuðla føroysk vakstrarhús og grøntmetisframleiðslu. Grunnurin yvirtekur soleiðis verandi ognir vakstrarhúsgrunsins og yvirtekur harumframt lánini, sum vakstrarhúsgrunnurin hevur latið. Játtan krevst sostatt ikki í fíggjarárinum 1997. Tó hevur tingið møguleika at økja um stovnsfæið á seinnu fíggjarlógunum.

Grunnurin skal hjálpa verandi og nýggjum vakstrarhúsum og grønmetisframleiðarum at menna seg í kappingini við útlendskar kappingarneytar. Við tað at ein nú hevur møguleika at stuðla uttandura grønmetisframleiðslu, skuldi tað verðið møguligt at fingið gongd á hesa vinnugrein í Føroyum, og samstundis gjørt tað møguligt hjá føroyskum brúkarum at keypa meira av føroyskt framleiddum grønmeti.

Grunnurin hevur sostatt møguleika at stuðla og geva lán til ný- ella umbygging, sum hava við sær betri kappingarmøguleikar hjá vinnuni. Eisini skal grunnurin stuðla gransking og menning hjá framleiðarunum, soleiðis at framleiðslan altíð er í menning. Harumframt er neyðugt at stuðla marknaðarføring, tí hetta ofta kostar nógvan pening hjá framleiðarunum sum eru smáir, og sostatt ikki hava neyðugu fíggjarorkuna til tess.

Fíggjarligu avleiðingarnar av uppskotinum eru ongar, tí grunnurin yvirtekur ogn vakstrarhúsgrunsins.

Viðmerkingar til einstøku greinirnar

Ad § 1. Tað er bert vakstrarbús ella uttandura grønmetisframleiðsla, sum kann fáa lán ella studul úr grunninum

Ad § 2. Hetta orðaljóðið er í samsvar við reglurnar um ráðharraábyrgd, soleiðis at talan er um landsstýrismannin og ikki landsstýrið sum so.

Ad § 3. Fyri ikki at gera umsitingina ov fløkta, verður umsitingin av grunninum latin til jarðarráðið, sum eisini hevur havt vakstrarhúsgrunnin um hendi.

Ad § 4. Vakstrarhúsgrunnurin verður niðurlagdur, og ognin, sum er bankabók í landsbankanum áljóðandi 4,0 mió. kr. og útlán áljóðandi 1,2 mió. kr., verða fluttar hesum grunni.

Ad § 5. Grunnurin hevur møguleika at veita bæði lán og studul. Møguleiki er at fáa lán í byggitíðini umframt veðhaldslán. Studul kann veitast til ný- ella umbygging. Umframt hetta, kann studul veitast til gransking, menning, marknaðarføring og orkusparandi tiltøk.

Ad § 5, stk. 2. Landsstýrismaðurin fyri avvarðandi øki hevur heimild at áseta í kunngerð nærri reglur og treytir fyri lánsveitingum, og skulu hesar liggja til grund fyri viðgerð av umsóknum. Viðgerð av umsóknum

eigur sum útgangsstøði at vera treytað av, at umsøkjari er bókhaldsskyldigur sambært § 1 B, pkt. 27 í løgtingslóg nr. 75, frá 24. oktober 1978 um bókhaldsskyldu, og meirvirðisgjaldsskrásettur sambært løgtingslóg nr. 136, frá 8 september 1992 um meirvirðisgjald við seinni broytingum. Eisini eigur tað at verða ásett í kunngerðini, at umsøkjari skal gera ítøkiliga prosjektlýsing við fylgiskjølum sum vísa rímuliga langtíðar rakstrar- og gjaldførisætlan fyri virksemið.

Ad § 6. Grunnurin skal á hvørjum ári leggja grannskoðan roknskap saman við frágreiðing um virksemi í undanfarna ári fyri landsstýrismannin.

Ad § 7. Grunnurin skal ikki rinda skatt ella avgjøld til landskassan av ogn sini.

1. viðgerð 1. august 1997. Uppskotið verð beint í vinnumevndina, sum 4. august 1997 legði fram soljóðandi:

Álit

Málið er lagt fram av landsstýrinum 30. juli 1997 og eftir 1. viðgerð 1. august 1997 beint í vinnumevndina.

Nevndin hevur viðgjørt málið, og tekur nevndin í høvdusheitinum undir við uppskotinum. Ein samd nevnd heldur tað tó ikki vera beint, at Jarðarráðið er stýri grunsins, men metir nevndin, at grunnurin eigur at hava sjálvstøðugt stýri, sum landsstýrismaðurin í landbúnaðarmálum tilnevnir.

Ein samd nevnd setir tí fram soljóðandi

broytingaruppskot

2. viðgerð 6. august 1997. Broytingaruppskot til § 3, stk. 1 samtykt við 13-0-11 atkvøðum. § 3 soleiðis broytt samtykt við 17-0-7 atkvøðum. §§ 1 og 2 og 4-7 samvktar við 20-0-4 atkvøðum. At málið soleiðis samtykt kann fara til 3. viðgerð samtykt við 19-3-2 atkvøðum.

3. viðgerð 9. august 1997. Uppskotið, sum samtykt við 2. viðgerð, endaliga samtykt við 17-0-8 atkvøðum

Løgtingslóg nr.134 frá 20. august 1997.
F.L. j.nr. 1720-3/90

5 Ríkislógartilmæli um lóg um danskan eksportkreditfond v.m.

Ár 1997, leygardagin 9. august, legði løgmaður vegna fyri Johannesen, landsstýrisnum, vegna landsstýrið fram soljóðandi:

Uppskot
til
ríkislógartilmæli um lóg »om dansk eksportkreditfond m.v.«

Mælt verður ríkismyndugleikunum til at seta í gildi fyri Føroyar »lov nr. 1070 af 20. december 1995 om Dansk Eksportkreditfond m.v.«

Viðmerkingar
Í skrivi frá ríkisumboðnum frá 27. februar 1997, (hjálagt), verður boðað frá, at lóg um útflutningskreditt-

grein (hjálagt) kann kunngerast fyri Føroyar. Føroyar hava fyrr havt eina tílíka skipan at galda fyri Føroyar, men er hon sett úr gildi við omanfyri standandi lóg. §§ 12, 13 og 14 hava ikki týdning fyri Føroyar, tí hetta viðvíkur bert donskum viðurskiftum.

Í Føroyum hevur Vinnumálastýrið fingið áheitan frá vinnuni um at gera ein útflutningskredittgrunn, og er henda skipan sostatt ein loysn hesum viðvíkjandi. Ætlanin er, at donsku reglarnar á hesum øki skulu gerast meiri nýmótans og kappingarførar.

Útflutningskredittgrunnurin skal umfata serligan váða viðvíkjandi sølu til útlandið, her er talan bæði um veðhald og fígging.

Vinnumálastýrið hevur havt lógina til hoyringar hjá fylgjandi:
Menningarstovuni
TK-stovuni
Reiðararfelagið fyri farmaskip
Arbeiðsgevarafelagið
Reiðarafelagið
Íðnaðarfelagið
Granskoðaravirkið Inpact
Granskoðarvirkið KPMG
Granskoðaravirkið Rasmussen & Weihe

Svar er fingið frá Inpact, TK-stovuni, Reiðarafelagnum, Arbeiðsgevarafelagnum, KPMG og Menningarstovuni, og mæla øll til, at lógin verður lýst at galda í Føroyum.

(Skjølini sum viðløgd eru, eru lógin og viðmerkingar ráðharrans, tá ið uppskotið til lógina var lagt fyri fólkatingið. Tey eru burturúrløgd í løgtingstíðindum. Víst verður til lovtidende og folketingstidende).

1. viðgerð 16. september 1997. Uppskotið varð beint í vinnunevndina, sum 24. september legði frum soljóðandi:

Álit

Málið varð lagt fyri løgtingið av landstýrinum 9. august 1997 og eftir 1. viðgerð 16. september 1997 beint í vinnunevndina.

Eftir uppskotinum verður mælt ríkismyndugleikunum til at kunngera at galda fyri Føroyar lógina um danskan eksportkreditfond v.m.

Undir viðgerðini hevur nevndin havt fund við Ivan Johannesen, landsstýrismann, og Arna Poulsen, vinnumálastjóra. Eksportkreditgrunnurin tekur sær av ríkisins eksporttryggingarvirksemi og høvuðsendamálið er at tryggja dygg kappingarlig vilkor hjá donskum eksporti. Hjá eksportkreditgrunninum kunnu eksportørar og peningastovnar tryggja seg ímóti, at keypari ella banki hansara ikki rindar. Tryggjað verður bæði ímóti politiskum og handilsligum vandum, t.v.s. vandar í samband við krígg, borgarakríggj, innflutnings- ella útflutningsforboð og valutamangul og tí vanda, at keyparin ikki hevur gjaldsevni. Fyri tryggingina verður goldið eitt gjald. Harumframt veitir eksportkreditgrunnurin hjálp til eksportfígging.

Ein samd nevnd mælir løgtinginum til at samtykkja uppskot landsstýrisins.

Lasse Klein, sum tekur undir við uppskotinum, hevur annars hesar viðmerkingar:

Aflaná at hetta ríkislógartilmæli er samtykt, hevur hvørki Føroya Løgting, Føroya Landsstýri ella annar føroyskur myndugleiki nakra ávirkan á gongdina í hesum máli, og hóast hann tekur undir við málinum, heldur hann tað verða óheppið at seta danskar lógir í gildi fyri Føroyar, sum politisku myndugleikarnir onga ávirkan hava á, og tí mælir hann til, at stig verða tikin til at bøta um hesa gongd.

2. viðgerð 30. september 1997. Uppskot landsstýrisins samtykt við 22-0-1 atkvøðum. At uppskotið soleiðis samtykt skuldi fara til 3. viðgerð samtykt 23-1-0.

3. viðgerð 7. oktober 1997. Ríkislógartilmælisuppskotið, sum samtykt við 2. viðgerð, endaliga samtykt við 20-4-0 atkvøðum

Ríkislógartilmæli staðfest 23.10.1997.
F.L. j.nr 1100-13/97.

6 Broyting í løgtingslóg um vinnuligan fiskiskap

Ár 1997, týsdagin 16. september, legði Henrik Old, løgtingsmaður, fram soljóðandi:

U p p s k o t
til
løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um vinnuligan fiskiskap

§ 1.

Í løgtingslóg nr. 28 frá 10. mars 1994 um vinnuligan fiskiskap við seinnu broytingum verður gjørd hendan broyting:

Í § 29, stk. 3, verður síðsta punktum orðað soleiðis: »Hevur fiskifar boðað frá, at fiskað verður á ytru fiskidagaleið, og seinri á sama túri ætlar at fiska á innaru fiskidagaleið, skal boðast Fiskiveiðieftirlitinum frá hesum í minsta lagi 4 tímar, áðrenn farið verður inn á innaru fiskidagaleiðina at fiska.«

§ 2.

Hendan lóg kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

Viðmerkingar

Ætlanin við hesum uppskoti er at gera skipanina við fiskidøgum meira smidliga, soleiðis at til ber at skifta frá ytru fiskidagaleiðini á innaru fiskidagaleiðina uttan at bróta túrin av og fara inn at landa. T.d. kann skip nýliga hava byrjað túr á ytru leiðini, og síðani verða neyðt at gevast ella liggja stilt í fleiri dagar orsakað av illveðri, tá væl hevði verið roynandi á innaru leiðini.

Sum skipanin nú er, halda skip seg altur við at royna á uttaru leiðini, av tí at túrurin má brótast av, um ikki er roynandi fyri veður ella ov lítlum fiskiskapi. Koma skip inn upp undir vikuskifti, má liggjast í tveir dagar, áðrenn fiskurin fæst upp, og nýggjur túrur kann byrja aftur.

Harumframt hevur hetta við sær útreiðslur fyri minstulønarskipanina, sum kundi sloppist undan, um skipini kundu gjørt túrin lidnan á innaru leiðini.

Endamálið við umbýtinum av fiskidøgum millum innaru og ytru leiðina var í mest møguligan mun at fáa skip at royna á uttaru leiðini, men sum skipanin í seinastoni hevur virkað, er gongdin tann øvugta.

Fyri at rætta henda skeivleikan verður tí sett fram hetta broytingaruppskot.

1. viðgerð 19. september 1997. Uppskotið verð beint í vinnunevndina, sum 7. oktober 1997 legði fram soljóðandi:

Álit

Málið var lagt fyri løgtingið av Henrik Old 15. september 1997 og eftir 1. viðgerð 19. september 1997 beint í vinnunevndina.

Vinnunevndin hevur viðgjørt uppskotið og býtt seg í ein meirluta og tveir minnilutar.

Meirlutin (Jørgen Niclasen, Bjørn á Heygum, Lasse Klein, Helena Dam á Neystabø og Ernst Hansen) tekur ikki undir við uppskotinum vísandi til, at upplýst er, at tað í praksis ikki letur seg gera at handhevja skipanina, sum er í uppskoti.

Ein minniluti (Heini O. Heinesen) viðmerkir, at hann ongantíð hevur tikið undir við skipanini við ytru og innaru leiðini, og at hann tí heldur ikki kann taka andir við skipanini í uppskoti.

Ein minniluti (Henrik Old) mælir løgtinginum til at samtykkja uppskotið vísandi til viðmerkingarnar. Sami minniluti boðar frá, at fellur uppskotið, fer hann at seta fram uppskot um at avtaka skipanina við ytru og innaru leiðini.

2. viðgerð 10. oktober 1997. Uppskotið fall 6-0-16.

7 Áheitan um løgtingslógar- ella ríkislógar-tilmælisuppskot um at bøta um VHF-sendinetið

Ár 1997, fríggjadagin 19. september, legði Tordur J. Niclasen, løgtingsmaður, vegna Miðflokkin fram soljóðandi:

Uppskot
til
samtyktar

Við atliti til at bøta trygdina á sjónum verður heitt á landsstýrið um at fyrireika og leggja løgtingslógar- ella ríkislógartilmælisuppskot fyri tingið, sum skapar fortreytir fyri, at VHF-sendinetið verður útbygt soleiðis, at VHF-samskiftið við land verður møguligt á allari innaru landleiðini.

Viðmerkingar
Hóast ein støðug útbygging av VHF-tænastuni síðan 1965 er farin fram, so má ásannast, at lurtilíkindini kring landið als ikki eru nøktandi.

Her verður serliga hugsað um lurtilíkindini, har tey eru ringast, eitt nú í Djúpunum og inn í millum oyggjarnar norðanfyri.

Í 1985 samtykti Føroya løgting – eitt sama ting – «løgtingslóg um hjargingarútgerð á bátum undir 5 BRT«. Henda lóg áleggur øllum opnum bátum frá áttarumnafari og uppeftir og øllum deksførum undir 5 BRT at hava neyðsendara av VHF-slagi umborð.

Lítil ivi man vera um, at tá lógin um »bjargingarútgerð á bátum undir 5 BRT« varð samtykt, so varð tikið fyri givið, at VHF-sendinetið átti at verið so mikið útbygt, at VHF-urin kom til sín sanna nett og ikki fór at reynast sum ein følsk trygd.

Í 1987 hevði samferðslunevndin fund við telefonverksstjóran og leiðaran á telegrafstøðini um hesi viðurskifti, sum útróðrarmenn høvdu gjørt vart við, og ásannaðu hesir, at ávísir trupulleikar funnust, og vístu teir samstundis á, at neyðugt varð at fara upp í hæddina á fjøllunum við møguligari nýggjari støð, um munagóður bati skuldi sleggjast.

Havandi trygdina hjá teim siglandi í huga, tók samferðslunevndin upplýsingarnar frá telefon-og telegrafstjóranum til eftirtektar, og í uppskoti til samtyktar varð við 28-0 atkvøðum heitt á landsstýrið um at taka upp samráðingar við danska Post-og Telegrafvæsenet viðvíkjandi spurninginum um møguleikan fyri at fara upp í hæddina við nýggjari VHF-støð.

Í 1990, tá einki stórvegis var hent í málinum, reisti undirritaði fyrispurning í tinginum hesum viðvíkjandi.

Í svarinum varð m.a. sagt, at Telefonverkið hevði havt fyrispurning hjá Post-og Telegrafvæsenet, og at hesir ikki vóru sinnaðir at bera kostnaðin av møguligari flytan ella uppsetan av nýggjari VHF- sendistøð.

Annars varð upplýst, at Telefonverkið hevði gjørt nakrar metingar av, hvat møguliga kundi gerast til tess at betra um viðurskiftini.

Her varð m.a. víst á, hvussu langt VHF-sendistøðin á Eysturhøvda á Svínoy røkkur. Hvussu langt ein møgulig VHF-støð á Klubbanum á Fugloynni røkkur, og hvussu langt ein møgulig støð, sett upp á Støðlafjalli á Eysturoynni, røkkur.

Flytingin av Svínoynni til Fugloynna er framd, men eru viðurskiftini enn ikki nøktandi.

Stórir trupulleikar eru framvegis millum oyggjarnar norðanfyri.

Útróðrarmenn norðanfyri hava gjørt vart við, at uppsetan av støð á Eiðiskolli hevði bøtt munandi um hoyrilíkindini.

Í Vestmannasundi eru hoyrilíkindini eisini sera vánalig. Hetta hevur tíanverri enn eina ferð verið sjón fyri søgn.

Ein háttur at bøtt munandi um henda trupulleika var, at sendarint í Havn varð flutur upp á Sornfelli.

Vórðu nevndu møguleikar settir í verk, so vildi tað bøtt um VHF-hoyrilíkindini – og harvið økt trygdina hjá útróðrarmonnum munandi.

Kostnaðarmetingarnar, ið tá vóru gjørdar viðv. Støðlafjalli, lógu um góða mió.kr. Hetta eru væl givnir pengar, tá hugsað verður um, at endamálið er at bøta um trygdina hjá teim, ið troyta sjógvin.

5. februar í seinastu tingsetuni (løgtingsmál 41/1996) legði Miðflokkurin fíknandi uppskot á ting, hur áherðsla varð løgd á at fáa nevndu viðurskifti í rættlag sum skjótast.

Málið varð viðgjørt í Mentanarnevndini, og varð m.a.frá TLF upplýst, at neyðugt varð við fleiri nýggjum støðum, um VHF skal røkka allastaðni á innari landleiðini.

Eisini varð ført fram, at ein møgulig orsøk til støðuna var ógreiða um leiklutin hjá Siófartsstyrelsen, sum hevur ábyrgdina av trygdini á sjónum.

Hvør enn er orsøkin, er tað átaluvert, at eitt slíkt álvarsmál enn ikki er vorðið loyst. Tað kann als ikki góðtakast, at líkasælan til tess at loysa málið heldur fram.

Nú má landsstýrið ikki bíða longur, men taka ta avgerð, sum er neyðug til tess at fáa loysn á hesum álvarsmáli – áðrenn fleiri óhepnar/syrgiligar hendingar spyrjast burturúr.

1. viðgerð 23. september 1997. Uppskotið varð beint í mentanarnevndina, sum 10. desember 1997 legði fram soljóðandi:

Álit

Málið er lagt fram av Miðflokkinum tann 15. september 1997 og eftir 1. viðgerð tann 23. september 1997 beint í mentanarnevndina.

Mentanarnevndin hevur viðgjørt málið og hevur undir viðgerðini biðið um frágreiðing frá landsstýrismanninum um, hvussu gongst at útinna løgtingsamtyktina í løgtingsmáli nr. 41/1996, sum varð samtykt á løgtingsfundi 19. apríl 1997.

Við skrivi, dagfest 30. oktober 1997, hevur Vinnumálastýrið sent mentanarnevndini umbidnu frágreiðing frá landsstýrismanninum.

Undir viðgerðini hevur nevndin býtt seg í ein meiriluta og tveir minnilutar.

Meirilutin í mentanarnevndini (Bjarni Djurholm, Lisbeth L. Petersen, Maria Hansen, Jógvan Adolf Johannessen og Rúna Sivertsen) tekur ikki undir við uppskotinum frá Miðflokkinum og setur eingi uppskot fram.

Meirilutin vísir á, at løgtingið í seinastu tingsetu samtykti at heita á landsstýrið um skjótast til ber at heita á avvarðandi danskar myndugleikar um at fáa hesi viðurskifti í rættlag, so at VHF-samskiftið ella annað nøktandi samskifti við land verður møguligt á allari innari landleiðini.

Hóast bøtt verður um verandi skipan, so verður ikki rokkið til øll sjóøki við Føroyar.

Meirilutin staðfestir, at landsstýrið og T.F.L. arbeiða við málinum, og at nýggj neyð- og trygdartænasta er í umbúna. Skipanin verður royndarkoyrd um 2-3 ár.

Meirilutin tekur sostatt ikki undir við uppskoti Miðfloksins og vísir annars til frágreiðing frá Vinnumálastýrinum og »Aftale mellem Forskningsministeriet, Føroya Landsstýri, Telefonverk Føroya Løgtings og Tele Danmark A/S om overdragelse af teleanlæg og varetagelse af teletjenester på Færøerne«. Avrit av frágreiðingini og avtaluni eru viðløgd.

Ein minnilutin í Mentanarnevndini (Signar á Brúnni) setir fram aftur uppskot um at heita á landsstýrið um eftir § 3 í heimastýrislógini at taka upp samráðingar við ríkismyndugleikarnar um yvirtøku av málsøkinum »Radio«.

Minnilutin (Signar á Brúnni) setir fram soljóðandi:

Broytingaruppskot

Heitt verður á landsstýrið um eftir § 3 í heimastýrislógini at taka upp samráðingar við ríkismyndugleikarnar um yvirtøku av málsøkinum »Radio«.

Ein annar minniluti í mentanarnevndini (Heine Lützen) tekur undir við uppskotinum hjá Miðflokkinum.

Skjøl til álitið frá mentanarnevndini:

Tórshavn, tann 30-10-97
J.Nr.: 1929-2/90
(at tilskila í svari)

Viðgjørt: SI

Tygara skriv 15-10-97
tygara j.nr.: lm 7/1997

Mentannarnevnd Løgtingsins
Áarvegur 2
Boks 208
110 Tórshavn

Viðv. løgtingssamtykt (løgtingsmál nr. 41/1996) um at heita á landsstýrið um taka upp samband við avvarðandi danskar myndugleikar fyri at bøta um trygdina á innaru landleiðini viðv. VHF- ella annað líknandi samskifti

Í tilgongdini at yvirtaka uttanlanda fjarskifti frá donskum ríkismyndugleikum og arbeiðinum at gera føroyska fjarskiftislóggávu hevur nógv samband verið við danska Forskningsministeriet og Tele Danmark.

Umsiting landsstýrismansins á økinum er Samskiftisdeildin í Vinnumálastýrinum, og hevur Samskiftisdeildin saman við leiðslu Telefonverksins og dønum m.a. viðgjørt spurningin um VHF-sendinetið í Føroyum á fundum í nevndu arbeiðstilgongd.

Málsøkið viðvíkjandi neyð- og trygdartænastum á sjónum í Føroyum liggur undir ríkismyndugleikunum.

Ætlanin er í næstu framtíð, ætlandi innan 2-3 ár, at eitt nýtt altjóða kervi verður sett inn ístaðin fyri verandi VHF-skipan. Henda nýggja neyð- og trygdarskipanin nevnist GMDSS, og verður hon uppihildin við bæði fylgisveinum og landføstum sendi- og móttøkuanleggum. Skipanin, ið umfatar neyð- og trygdarsamskifti á millumbylgju, stuttbylgju og VHF, verður digitaliserað.

Orsakað av tí heldur høga prísinum hjá skipum at hava GMDSS verður hetta, í øllum førum tey fyrstu árini, helst bert ein skipan fyri størri skip. Hjá smáum skipum og smábátum verður besta loysnin í næstu framtíð at hava eina fartelefon, ið kann hava samband við fylgisvein.

Trupulleikin, sum nevnda løgtingssamtykt viðger, er, at tað eru nøkur »hol« í VHF-dekninginum nær landi sumstaðni í Føroyum, har ynskiligt er at fáa dekningin so nær tað fullkomna sum gjørligt. Land okkara er soleiðis háttað viðvíkjandi landafrøði og topografi, at tað er ógjørligt at fáa ein heilt fullkomnan dekning, tí tað hevði havt við sær, at eyka sendistøðir vórðu settar upp í fleiri støðum fyri bert at nøkta tørvin í sera smáum og avmarkaðum økjum. Tað er ikki fíggjarliga skilagott at seta dýr anlegg upp, og harvið økja munandi um samlaða kostnaðinum av skipanini, fyri bert at økja heilt marginalt um dekningin. Hisini skal her verða víst á, at nógv størri trygd liggur í samskiftismøguleikunum við onnur skip enn við samband til móttøkustøð á landi.

Kortini eigur tað at verða gjørt, sum skil er í, tá hugsað verður um bæði kostnað og økta trygd. Her kann nevnast, at Telefonverkið er farið undir at kanna møguleikarnar fyri, at VHF-støðin á Húsareyni kann verða flutt niðan á Sornfelli. Hetta skuldi givið munandi betri radiodekning í Vestmannasundi, uttan at fært til stórvegis ampa aðrastaðir.

Danir hava boðað Telefonverkinum frá, at føroyingar sjálvir mugu bera kostnaðin av at flyta eina stað ella seta nýggja støð upp á øðrum stað enn tær verandi. Her kann at enda verða upplýst, at fyribils meting hjá

Telefonverkinum ger kostnaðin av at seta eina nýggja støð upp til 1-1½ mió. kr., og árligi rakstrarkostnaðurin fer væntandi at liggja um 200.000-400.000 krónur. Hesi tøl skulu takast við fyrivarni.

Annars eru ffeggjarligu viðurskiftini millum danskar og føroyskar myndugleikar á hesum øki greinað í avtalu, sum endaliga varð undirskrivað 27. oktober í ár.

Hjálagt:

- »Aftale mellem Forskningsministeriet, Færøernes Landsstyre, Telefonverk Føroya Løgtings og Tele Danmark A/S om overdragelse af teleanlæg og varetagelse af teletjenester på Færøerne«, dagfest 27. oktober 1997.
- Frágreiðingin »De maritime nød- og sikkerhedstjenester« frá Tele Danmark A/S, dagfest 23. juli 1997.

Virðingarmest,

Sámal Petur í Grund
landsstýrismaður

/ Arne Poulsen
aðalstjóri

Aftale mellem
Forskningsministeriet, Færøernes Landsstyre,
Telefonverk Føroya Løgtings og Tele Danmark A/S
om overdragelse af teleanlæg og varetagelse af teletjenester
på Færøerne

INDLEDNING

I denne aftale er nævnt en række parter:

Færøernes Landsstyre varetager den administrative myndighed for de sager og sagsområder, der indenfor rammerne af Lov om Færøernes hjemmestyre er overtaget som færøske særanliggender.

Telefonverk Føroya Løgtings – herefter benævnt *TFL* – er en institution under Landsstyret, der har til formål at drive telekommunikationsvirksomhed på Færøerne.

Forskningsministeriet – herefter benævnt *Ministeriet* – varetager de departementale funktioner for den samlede telesektor.

Under Ministeriet er etableret en styrelse – *Telestyrelsen* – der varetager en række myndighedsopgaver på telekommunikationsområdet.

Tele Danmark A/S – herefter benævnt *Tele Danmark* – er en dansk virksomhed, der udfører telekommunikationsopgaver i Danmark og i forbindelse med udlandet. Den danske stat er majoritetsaktionær i Tele Danmark.

§ 1 OM ENERETTEN

I *lov nr. 84 af 11. maj 1897 om telegrafer og telefoner* er det fastslået, at »staten har på dansk land- og søterritorium eneret til anlæg og drift af telegrafer og telefoner«.

I medfør af *lov nr. 111 af 30. maj 1927* har »Lagtinget eneret til anlæg og drift af telefoner på Færøerne«.

Med *lov nr. 137 af 23. marts 1948 om Færøernes hjemmestyre* er »*Stedligt post- og telegraf- og telefonvæsen*« optaget på listen over områder, der »...straks overgår til det færøske selvstyre eller senere overføres til dette efter begæring fra lagtinget eller regeringen«.

Sagsområdet »stedligt telegraf- og telefonvæsen« er således siden 1948 principielt et færøsk særanliggende, men i mangel af formel anmodning om overtagelse har staten fortsat udøvet eneretten på visse områder.

Udøvelsen af eneretten er sket i nært samarbejde mellem TFL og Ministeriet, og der er herigennem foretaget en gradvis overførsel af opgaver og anlæg til hjemmestyret. Senest er der 30. maj 1988 indgået aftale mellem parterne om, hvem der udfører teletjenesterne på Færøerne.

§ 2 OM TELETJENESTERNE PÅ FÆRØERNE

Parterne er enige om:

1) De i § 4 opregnede telekommunikationsanlæg på Færøerne overdrages til TFL på vegne af Landsstyret, med en deraf følgende ændret varetagelse af kystradiotjenesten og teletjenesterne til og fra Færøerne.
2) TFL (Landsstyret) varetager på hjemmestyrets vegne kundeansvaret over for alle kunder på Færøerne for alle teletjenester, internt på Færøerne og mellem Færøerne og omverdenen.
3) TFL (Landsstyret) varetager på hjemmestyrets vegne tjenesteansvaret for teletjenester på Færøerne, forudeu den del af tjenesteansvaret for teletjenester mellem Færøerne og omverdenen, der omfatter telekommunikationsanlæg og forhold på Færøerne.
4) Ved »på Færøerne« forstås i denne forbindelse et begrænset geografisk område, der omfatter det til enhver tid værende færøske land- og søterritorium.
5) Disse overdragelser skal, ligesom de overdragelser der skete ifølge aftale af 30. maj 1988 mellem parterne, ses som en overdragelse i medfør af lov om Færøernes hjemmestyre § 2. Hjemmestyret har herefter den lovgivende og administrative myndighed hvad angår telegraf- og telefonvæsen på Færøerne, herunder televæsen mellem Færøerne og omverdenen, for så vidt angår forhold på Færøerne.

§ 3 OM TELETJENESTERNE TIL OG FRA FÆRØERNE

Ministeriet har fremført, at man tolker Lov om Færøernes hjemmestyre og Lov om telegrafer og telefoner derhen, at eneretten til formidling af teletjenesterne til og fra Færøerne samt etablering og drift af de tilhørende anlæg fortsat beror hos staten.

Eneretten til udbud til abonnenter af enhver form for offentlige teletjenester på Færøerne, internt på Færøerne og mellem Færøerne og omverdenen, og etablering og drift af de tilhørende anlæg på Færøerne beror dog hos Færøernes hjemmestyre.

Der er således tale om en delt eneret. Staten har eneret til formidling af teletrafik mellem Færøerne og omverdenen, mens hjemmestyret har eneret til formidling af ankommende og afgående trafik til og fra Færøerne på Færøerne.

Tilvejebringelse af grundlaget for udbud af teletjenester til og fra Færøerne, samt etablering og drift af de tilhørende anlæg, sker i samarbejde mellem eneretshaverne.

Ministeriet har i den forbindelse anført:

1) at man fortsat vil arbejde for, at der gennem de nødvendige lovændringer kan skabes basis for, at teletjenesterne til og fra Færøerne samt de tilhørende tekniske anlæg kan overdrages som et hjemmestyreanliggende,
2) at Tele Danmark med gennemførelsen af *lov nr. 743 af 14. november 1990 om visse forhold på telekommunikationsområdet* med senere ændringer er blevet pålagt at etablere og drive de nødvendige tekniske anlæg for afviklingen af teletrafikken til og fra Færøerne, og at anlæggene – med fornødent hensyntagen til de særlige geografiske forhold – skal udformes ud fra en hovedmålsætning om, at trafikken kan

afvikles på lige fod med den interne danske trafik, samt at anlæggene i øvrigt udformes og tilrettelægges i samarbejde med det færøske televæsen, og

3) at den betaling, TFL skal udrede til Tele Danmark for afviklingen af teletrafikken via teleanlæggene til og fra Færøerne, skal fastsættes med formålet hensyntagen til det ønskelige i ikke at skabe unødige økonomiske barrierer for Færøernes samkvem med omverdenen.

Parterne er på den baggrund enige om:

1. at de for teletjenesterne til og fra Færøerne nødvendige anlæg udformes, udbygges og tilrettelægges i samarbejde mellem Tele Danmark og TFL.
2. at man fortsat vil arbejde for, at teletjenesterne til og fra Færøerne samt de tilhørende tekniske anlæg overgår til Færøernes hjemmestyre som særanliggende.

§ 4 OM OVERDRAGELSE AF ANLÆG

Med indgåelse af denne aftale overdrages følgende af Tele Danmark ejet teleanlæg på Færøerne til TFL på vegne af landsstyret:

1. Telestationen på Tinghúsvegur i Tórshavn. Dvs. matr. nr. 736 v, 737 b og 736 x med tilhørende bygninger.
2. Bygning for MF-sender beliggende på lejet areal i Haugen på Varda.
3. Bygning for jordstation liggende på TFL's grund på Húsareyn.
4. Andelen i bygning for bl.a. VHF-sender og modtager beliggende på areal ejet af TFL på Mykines.
5. SHEFA-kablets landkabelende mellem Telestationen og søkabellandingen ved Hvítanes, samt det tilhørende jordpladesøkabel mellem Telestationen og Bøfjanesgjógv. SHEFA-kablet er dog nu taget ud af drift.
6. Jordkablerne på strækningerne Telestationen-Varda og Varda-Húsareyn.
7. Jordkablerne mellem Telestationen og de fremskudte MF-modtageantenner i Tórshavn.
8. De 2 fremskudte modtageantenner for MF placeret på matr. nr. 1992 a i Tórshavn.
9. Alt teleteknisk udstyr på Telestationen, på forstærkerstation Tórshavn 3 beliggende i telefonhuset på Tinghusvegur, samt på flyvestationen i Tórshavn.
10. Alt teleteknisk udstyr på Húsareyn, herunder satellitjordstationen.
11. Alt teleteknisk udstyr for kystradiotjenesten, herunder udstyret for den maritime nød- og sikkerhedstjeneste.
12. Alt måleudstyr og reservemateriel mv. for ovennævnte anlæg.
13. Al dokumentation vedrørende punkterne 1-12.

De pågældende anlæg er pr. 1. januar 1991 overtaget af TELECOM A/S (nu Tele Danmark A/S) med de sædvanemæssige forpligtelser, der indtil da havde påhvilet staten i henhold til den i lov om Færøernes Hjemmestyre forudsete overdragelse af særanliggender på telekommunikationsområdet.

Aftaleparterne er enige om, at overdragelsen sker vederlagsfrit. Ommatrikulering mv. sker ved TFL's foranstaltning og for TFL's regning.

§ 5 OM DEN RADIOBASEREDE MARITIME NØD- OG SIKKERHEDSTJENESTE

Med indgåelsen af aftalen forpligter TFL på vegne af landsstyret sig til at varetage alle udførende opgaver i forbindelse med en radiobaseret maritim nød og sikkerhedstjeneste på Færøerne. Tjenesten drives som en integreret del af kystradiotjenesterne ved Tórshavn Radio.

I overensstemmelse med bemærkningerne til § 2. stk. 4 og 5. i lov om visse forhold på telekommunikationsområdet, jf. lovbekendtgørelse nr. 501 af 22. juni 1995, opretholder Tele Danmark tjenesten i Danmark, Færøerne og Grønland i overensstemmelse med internationale forpligtelser herom. Regelfastsættelsen, dvs. fastsættelse af det retslige grundlag for opfyldelse af rigets internationale forpligtelser på området, henhører fortsat under Ministeriet, og det forudsættes, at telekommunikationssystemet på Færøerne udformes således, at det kan opfylde tjenestens behov.

Der ydes fra dansk side betaling til TFL på vegne af Landsstyret for udgifter i forbindelse med varetagelsen af tjenesten. Betalingen over for TFL udredes af Tele Danmark.

Betalingens størrelse fastsættes af Ministeriet efter indstilling fra Tele Danmark og TFL herom. Indstillingen indeholder tillige forslag til fremtidig regulering af betalingen.

Tele Danmarks og TFL's indstilling herom vedlægges denne aftale i form af et notat benævnt Den radiobaserede maritime nød- og sikkerhedstjeneste på Færøerne dateret 7. juni 1995 og revideret 1. november 1995.

TFL og Tele Danmark drøfter løbende udviklingen i den radiobaserede maritime nød- og sikkerhedstjeneste med henblik på at kunne gennemføre teknologiske og indholdsmæssige ændringer, effektiviseringer og rationaliseringer af tjenesten. I det omfang ændringerne måtte give anledning til ændring i betalingen for tjenestens udførelse, forelægges forslag herom for Ministeriet for godkendelse.

§ 6 OM UDMØNTNING AF AFTALEN

Denne aftale udmøntes i en driftsoverenskomst indgået mellem Tele Danmark og TFL. Gennem driftsoverenskomsten fastlægges de principielle og overordnede forhold omkring afviklingen af teletrafikken til og fra Færøerne.

Gennem driftsoverenskomsten sikres endvidere, at den i §2 beskrevne overdragelse af teleanlæg og ændrede varetagelse af teletjenester i udgangssituationen er økonomisk neutral for såvel Tele Danmark som TFL.

Driftsoverenskomsten vedlægges denne aftale. Ændring i driftsoverenskomsten skal forlods godkendes af såvel Ministeriet som Landsstyret.

§ 7 OM UDFYLDELSE AF AFTALEN

Der optages drøftelser mellem parterne med henblik på udfyldelse af denne aftale.

Drøftelserne finder sted i det allerede etablerede Udvalg vedrørende teleforhold Danmark - Færøerne. Udvalget fungerer samtidigt som kontaktforum mellem aftalens parter.

I drøftelserne indgår også en løbende sikring af, at udmøntningen af aftalens bestemmelser i driftsoverenskomsten, jf. § 6, sker på en hensigtsmæssig og rationel måde og i overensstemmelse med aftalen.

§ 8 OM AFTALENS IKRAFTTRÆDEN

Aftalen træder i kraft den 1. januar 1996 som en udbygning af aftalen af 30. maj 1988 mellem Generaldirektoratet for P&T og TFL på vegne af Landsstyret om de overordnede rammer for varetagelsen af telekommunikationsopgaver på Færøerne.

§ 9 OM REVISION AF AFTALEN

Aftalen er indgået på det den 1. januar 1996 gældende lovgivningsmæssige grundlag for telekommunikationsforhold i relation til Færøerne. Aftalen vil skulle revideres i takt med ændringer i lovgrundlaget i Danmark og på Færøerne. Dette vil primært gælde § 3 om teletjenesterne til og fra Færøerne, § 5 om betalingen for den radiobaserede maritime nød- og sikkerhedstjeneste og § 6 om udmøntningen af aftalen i en driftsoverenskomst mellem Tele Danmark og TFL.

For Forskningsministeriet
København, den

For Færøernes Landsstyre
Tórshavn, den

Tiltrådt af Tele Danmark A/S
Aarhus, den

Tiltrådt af Telefonverk Føroya Løgtings
Tórshavn, den

TELEDANMARK

FR97-014 23. juli 1997

De maritime nød- og sikkerhedstjenester
Formålet med at lave en ændring, der på kort sigt pålægger forsyningspligtudbyderen at udrede omkostninger til maritime nød- og sikkerhedstjenester i såvel Danmark, Grønland som Færøerne, bygger i væsentlig grad på den forventning, at omkostningerne til tjenesten om ikke forsvinder så dog reduceres væsentligt. Spørgsmålet er, om det er hensigtsmæssigt at lade bemærkningerne til lovforslaget fremstå, som om omkostninger til tjenesten vil falde drastisk pr. en bestemt dato.

I det nye globale maritime nød- og sikkerhedssystem GMDSS indgår både satellitsystemer og kystradiostationer med jordbaserede anlæg for maritim nød- og sikkerhedskommunikation på mellembølge, kortbølge og VHF. For nød- og sikkerhedstjenesterne via kystradiostationerne er forskellen fra det hidtidige system alene, at den kontinuerlige, manuelle, lyttevagt erstattes af automatisk overvågning baseret på, at nød- og sikkerhedsopkald initieres gennem en særlig, internationalt vedtagen kaldeform (baseret på anvendelse af det såkaldte digitale selektive kaldestystem). Den efterfølgende nød- og sikkerhedskommunikation foregår derefter på samme måde som hidtil.

Overgang til GMDSS er således ikke i sig selv ensbetydende med, at nød og sikkerhedstjenester ved kystradiostationer kan ophøre.

Erhvervsskibe kræves gennem internationale og/eller nationale bestemmelser udrustet med radioudstyr for maritim nød- og sikkerhedskommunikation. I GMDSS er kravene til hvilke arter af maritime radioanlæg, det enkelte skib skal have ombord afhængig af, hvilke farvandsområder skibet har tilladelse til at besejle. Foruden specialudstyr skal skibe bl.a. have VHF og, uden for kystnære farvande, MF radionalæg ombord.

Skibene omfattet af de internationale krav om overgang til GMDSS er indtil videre alene passagerskibe og handels- og lastskibe på 300 brt og derover, sejlende i international fart. Disse skibe udgør på verdensplan kun ca. 10% af verdensflåden. Det er alene disse skibe, der således internationalt er pålagt at være overgået til GMDSS senest 1.2.1999.

For de øvrige 90% af erhvervsskibenes vedkommende afhænger tidspunkt og krav vedr. overgang til GMDSS af de enkelte, nationale søfartsmyndigheders vedtagelse og gennemførelse af GMDSS krav for sådanne skibe under deres flag. Kun ganske enkelte lande, bl.a. Finland, vides indtil nu at have forhandlet og indført definitive krav om deres erhvervsskibes overgang til GMDSS.

Hertil kommer alle lystsejlere udrustet med maritime VHF radionnlæg.

Alt i alt vil således med rimelig stkkerhed kun ca. 10% af flåden være overgået til GMDSS pr. den 1.2.1999, og de hidtidige nød- og sikkerhedstjenester, herunder manuel lyttevagt på kyststationer må derfor af hensyn til de resterende skibes sikkerhed forsætte parallelt med GMDSS i nogle år udover 1999, indtil tilstrækkeligt mange af disse skibe er overgået til GMDSS.

ITU's radioreglement fastsætter, at alle kyststationer opererende kommercielle radiotjenester også skal opretholde lyttevagt m.m. på maritime nødfrekvenser i samme frekvensbånd, herunder især nødkanalerne 2182 kHz og VHF kanal 16.

Disse bestemmelser forudses på ITU World Radio Conference 1997 blødgjort en smule, således at de forsat vil være obligatoriske, men sådan, at administrationer efter 1999 kan løse skibe og kyststationer under deres jurisdiktion fra denne pligt, når udviklingen vedr. overgang til GMDSS er så vidt fremskreden, at sikkerheden til søs ikke forringes herved.

Gennemførelsen af GMDSS vil ske glidende i årene efter 1999, og der kan for indevarende hverken internationalt eller nationalt sættes dato på, hvornår den manuelle lyttevagt på 2182 kHz og VHF kanal 16 kan ophøre på kyststationer.

2. viðgerð 15. december 1997. Uppskot um at heina málið aftur í nevnd fall 10-3-15. Broytingaruppskot frá minnilutanum í mentanarnevndini. Signar á Brúni, fall 12-3-13. Upprunauppskotið samtykt 14-1-13.

8 Uppskot til ríkislógartilmæli um »lov om tandplejere«

Ár 1997, týsdagin 23. september, legði Kristian Mugnussen, landsstýrismaður, vegna landsstýrið fram soljóðandi:

U p p s k o t
til
ríkislógartilmæli um »lov om tandplejere«

Mælt verður ríkismyndugleikunum til at seta í gildi fyri Føroyar hjálagda uppskot til kongliga fyriskipan um gildisseting fyri Føroyar av »Lov om tandplejere«.

Viðmerkingar

Nýggj lóg um tannrøktarar varð sett í gildi í Danmark 1. juli 1996. Í hesum sambandi heitti landslæknin á landsstýrið um samstundis at seta lógina í gildi fyri Føroyar við kongligari fyriskipan.

Somuleiðis heittu tannrøktarar í Føroyum tann 11. apríl 1997 á landsstýrið um at seta lógina í gildi fyri Føroyar. Nógvir tannrøktarar eru nú í Føroyum og nógvir teirra ynskja at byrja egnan praksis, sum vanligt er fyri tannrøktarar í Danmark. Hetta kunnu teir ikki gera, uttan at omanfyri nevnda lóg verður sett í gildi fyri Føroyar.

Heimild er fyri at seta lógina í gildi fyri Føroyar við kongligari fyriskipan. Málsøkið er ikki yvirtikið, heldur ikki sum § 9 yvirtøka, og tí ber ikki til at gera eina løgtingslóg um løggilding av tannrøktarum.

Lógin hevur verið til hoyringar hjá landslæknanum, Føroya Tannlæknafelag og hjá tannrøktartunum í Føroyum. Øll eru samd um, at lógin skal setast í gildi fyri Føroyar.

Lógin verður í Føroyum einsljóðandi og hin danska. Einastu frávikini eru, at tilvísingarnar í lógini eru broyttar samsvarandi lóggávuni í Føroyum, og at gildiskomureglurnar eru øðrvísi.

Eingin fíggjarligur kostnaður stendst av uppskotinum.

Skjal:

Anordning om ikrafttræden på Færøerne af lov om tandplejere

I henhold til § 20 i lov nr. 498 af 12. juni 1996 om tandplejere fastsættes herved, at loven skal være gældende for Færøerne i følgende skikkelse:

Kapitel 1
Autorisation

§ 1. Ret til at udøve virksomhed som tandplejer og betegne sig som tandplejer har kun den, der har modtaget autorisation som tandplejer i henhold til § 2, stk. 1, eller § 4, stk. 2.

§ 2. Den, der har bestået en af undervisningsministeren godkendt uddannelse for tandplejere, har ret til autorisation som tandplejer.
Kirkjustjórnin var samd um, at figgingarlógin eigur at verða sniðað soleiðis, at kirkjuráðini kunnu varðveita peningaligan stuðul frá privatfólki við t.d. at avseta upphæddir til ymisk endamál. Tryggd má vera fyri, at hesin peningur ikki fer beinleiðis til raksturin og harvið er við til, at kirkjuskattaprosentið fer niður.

Kirkjustjórnin hevur skift orð um, hvussu bóskandi tað er at hava almennar fundir í kirkjuráðunum, sambært kirkjuráðslógini.
Í jarðarferðarlógini § 8 stk. 2 stendur, at " var afdøde ved sin død medlem af folkekirken eller et trossamfund uden for folkekirken, anses dette som udtryk for et ønske om kirkelig begravelse, medmindre det modsatte godtgøres." Í somu lóg § 11 stk. 1 verður sagt, at "ved kirkelig begravelse fastlægges begravelseshandlingens

forløb af præsten efter forhandling med den, der ønsker begravelsen eller ligbrændingen lonelaget". Kirkjustjórnin heldur tað vera óheppið, at orðið "prestur" verður brúkt um tann persónin, sum skal vera við, tá tó t.d. ein baptistur skal jarðast.

Vinarlig heilsan, Vegna Kirkjustjórnina, Jens Kristian Birthin, skrivari

d. Skriv frá Føroya Kirkjustjórn 12. august 1996 til Landsstýrið við umsøgn til uppskotini frá kirkjumála ráðnum.

Føroya Landsstýri, att. Jákup Nielsen, fulltrúi, Postrúm 64, 110 Tórshavn
Tórshavn, hin 12. august 1996
J.nr.7101-009/JKB

Viðvíkjandi uppskoti til nýggja kirkjulóggávu.
Í skrivi dagfest 16. juli 1996 heitir Landsstýrið á Kirkjustjórnina um at umsøkja og gera møguligar viðmerkingar til uppskot til nýggja kirkjulóggávu fyri Føroyar við viðmerkingum, sum kirkjumálaráðið hevur tilevnað og uppskot til kunngerðir heusm viðvíkjandi.

Kirkjustjórnin hevur í skrivi dagfest 19. juli 1996 sent kirkjustjórnarlimunum uppskotið til umsøkis, men ongar viðmerkingar eru komnar higar. Víst verður antars til viðmerkingar frá Kirkjustjórnini í skrivi dagfest 5. mars 1996.

Sagt verður frá heusm.

Vinarlig heilsan, Vegna Kirkjustjórnina, Jens Kristian Birthin, stiftsfulltrúi.

13. august. 1996
F.L.j.nr. 2000-6/94

Avrit sent kirkjustjórnarlimunum

e. Skriv frá prestafelagnum 14. august 1996 til landsstýrið við umsøgn til uppskotini frá kirkjumálaráðnum við tilhoyrandi skjali dagfest 11. mars 1996

Sandur, hin 14. august 1996
att. Jákup Nielsen, fulltrúi, Føroya Landsstýri, Postrúm 64, 110 Tórshavn

Viðv. nýggjari kirkjulóggávu
Føroya Prestafelag takkar fyri brævið tykkara av 16. juli 1996, har biðið verður um umsøgn og møguligar viðmerkingar til uppskot til nýggja kirkjulóggávu v.m.

Í telefonsamtøðu í dag havi eg fingið upplýst, at uppskotið, vit hava fingið, er tað, sum kirkjumálaráðið hevur evnað til uttan aðrar viðmerkingar úr Føroyum enn frá Føroya stiftsstjórn. Tær viðmerkingar, sum prestafelagið í brævi sínum 11. mars 1996 hevur gjørt til uppskotið, eru sostatt eins lítlar og eitt nú viðmerkingarnar frá felagnum fyri kirkjuráðslimir liknar upp í uppskotið í verandi líki. Eg loyvi mær tí at senda avrit av nevnda brævi okkara.

Haraftrat havi eg hug at taka fram 4 mál í hesi nýggju lóggávu, endurtaka og vøka um nakrar av viðmerkingum okkara:

1. Almennir fundir. Málið verður nevnt í lov om folkekirkens økonomi § 24 stk. 3, og í lov om menighedsråd §§ 22 og 23. Ynskið um alment "budgetsamråd" og almennar kirkjuráðsfundir er neyvan komið úr Føroyum. Vit búgva so spjatt, at tað er lítið hugsandi, at t.d. fugloyingar skuldu møtt manmsterkir upp í budgetsamråð Runavík. Og kirkjuráðsfundir fara ofta fram í privatum heimum undir hugnaligum umstøðum. Í prestagjøldum, har fólkatalið er lítið, men kirkjuráðini nógv, koma § 22 viðtøkurnar at føra við sær eina umseting, sum er heilt úti av proportión. Teir fundir, har roknskapur verður framlagdur, kundu verið almennir; men fer lógin at krevja allar fundir almennar, kann væntast, at lógin mangan ikki verður hildin.

2. Prestagarðar. Hesir hoyra heinleiðis undir statin og verða umsitnir gjøgnum stiftsstjórnina. Kirkjuráðini hava einki sum helst við føroyskar prstagarðar at gera. Tí áttu orðini í lov om menighedsråd § 27 stk. 1 "Præster kan ikke deltage i forhandling og afstemning i sager, der vedrører præsteboliger" at verið strikað. Av sonu orsøk er § 18 tikin úr sonu lóg.

Tá ið føroyskt "boligcirkulære" - vónandi skjótt - verður evnað til við grundarlagi í lov om folkekirkens økonomi, hava vit skilt, at tað er ætlanin, at kirkjuráðini fáa heimild at gjalda fyri slíkt, sum staturin ikki vil gjalda, men danskir prestar sum eina sjálvfylgju fáa í dag, t.d. viðv. skrivstovuni: innbúgv, skrivimaskinur og líknandi tól, endurgjald fyri bita, elnýtslu og reingerð. Tryggjast má tí, at økonomilógin tekur hædd fyi hesum. Er tað hetta, sum meinast við í § 26): "Præsteembederne...", og skal tað vera landsstýrismaðurin í kirkjumálum heldur enn stiftsstjórn/kirkjumálaráð, sum skal gera reglur hesum viðvíkjandi?

3. Bispaval. Av tí at so fáir kirkjuráðslimir eru í Føroya biskupsdømi samtnett við tey donsku stiftini, verður í "Anordning om ikrafttræden... af lov om udnævnelse af biskopper..." § 4 skotið upp, at stillararnir hjá einum valevni skulu vera í minsta lagi 50 í tali heldur enn 75, sum lógin krevur í Danmark. Av sonu orsøk ráða vit til, at hægsta tal av stillarum eigur at vera 100 heldur enn 150. Tað er óheppið fyri fólkaræðið, um eitt valevni beinanvegin kann vísa á so stóran part av øllum veljarunum sum sínar stillarar, at valið longu framumanundan er avgjørt.

4. Jarðarferð. Uppskotini til "Anordning om ikrafttræden på Færøerne af lov om begravelse og ligbrænding" og til Bekendtgørelse for Færøerne om begravelse og ligbrænding" sýnast at vera gjørd uttan stórvegis kunnleika til tey serligu, føroysku viðurskiftini. Tað er ið hvussu er nakað nýtt, og uttan iva fer tað at volda nakrar trupulleikar, at áheitan um jarðarferð í hvørjum einstøkum føri hereftir skal ganga gjøgnum prest sum jarðarferðarmyndugleika og fara fram á serligum oyðubliði. (§§ 5 og 6 í lógini og § 2 í kunngerðini).

"Sognepræsten på afdødes bopælssted er begravelsesmyndighed," verður sagt í § 6 í lógini. Tað hevur verið ein sannroyd, at munur hevur verið gjørdur á Danmark og Føroyum. Doyggja fólk, sum hava bústað í Danmark, í Føroyum, er tað sóknarpresturin í bústaðarsóknini, sum er jarðarferðarmyndugleiki. Eisini, um hesi eru føroyingar og vilja verða jarðað í Føroyum. Doyggja fólk, sum hava bústað í Føroyum, í Danmark (eitt nú á Ríkissjúkrahúsinum), er tað sóknarpresturin á deyðsstaðnum (Sct. Johannes sogn), sum er jarðarferðarmyndugleiki. Tað má her getast púra greitt, um Føroyar eru útland mótvegis Danmark et vice versa.

§ 7 í lógini skilir ímillum "kirkelig begravelse" og "borgerlig begravelse". Henda terminologi er óføroysk. Strangt borgarligar jarðarferðir munnu vera fáar. Í tí føri, har hin deyði hoyrdi til eina samkomu uttan fyri fólkakirkjuna (eitt nú Brøðrasamkomuna), er talan um jarðarferð, sum ikki er kirkjulig, og fer fram utan prest, men brogarliga vildu samkomurnar neyvan kallað hana. Kundi ein meira høskilig formulering verið funnin?

Kirkjugarðarnir í Føroyum eru ikki fólkakirkjuligir, men kommunalir og tí er lítið hugsandi, at § 16 í lógini, um, at kirkjumálaráðharrin kann loyva trúarsamkomum uttan fyri fólkakirkjuna at gera egnar kirkjugarðar, skuldi verðið brúkt.

Prestafelagið fer at fylgja við tí víðari gongdini í málinum viðvíkjandi nýggjum kirkjulógum og er altíð hugað at viðgera møgulig nýggj ella broytt uppskot og siga sína ueining um tey.

Vinarliga, nevndarinnar vegna, Jákup Reinert Hansen, formaður

16. august 1996
FL.j.nr. 200-6/94

Tórshavn, hin 11. mars 1996
Føroya Landsstýri

Viðvíkjandi uppskotum til nýggjar kirkjulógir og kunngerðir. Viðmerkingar frá føroyska prestafelagnum.

Anordning om ikrafttræden for Færøerne
af lov om folkekirkens økonomi

§ 2 stk. 1, nr. 6: Vit hava skilt, at útreiðslur hesum viðvíkjandi m.a. snúgva seg um útreiðslur, sum hava við arbeiðsviðurskifti hjá prestum at gera. Vit hugsa um kontórinventar og -útgerð og annað, sum er nevnt í §§ 23 og 24 í uppskoti frá **Kirkjumálaráðnum** um *Cirkulære om tjenesteboliger for folkekirkens præster på Færøerne.* Í nr. 6 er tað **landsstýrismaðurin í kirkjumálum** (hereftir: landsstýrismaðurin), sum ger reglur?

§ 21,3 eru tað **kirkjuráðini og landsstýrismaðurin,** sum taka avgerð um *kirkens formue*, og í § 23.1 avger **kirkjumálaráðið, hvussu stiftsstjórnin** skal umsita *kirkernes... øvrige kapitaler?* Peningur, sum kirkjuráðini hava spart upp til ávís endamál, ella sum tey hava fingið til kirkjuna, eiga ikki at verða inndrigin sum *kapital* ell *formue*, sum kirkjuráðini missa avgerðarættin til.

§ 24,1 og 3 og 6: *I hvert provsti.* Vit halda tað vera avgjørt neyðugt, at Føroya dómpróstadømi verður býtt í trý: tveir próstar og dómprósturin. Annars verður t.d. *budgetsamråd* antin ógjørligt ella óraðiligt tíðarkrevjandi, um tað skal býtast sundur um alt landið. **Stk 3:** Tað er praktiskt (og bert nøkunlunda rímiligt nærdemokratiskt) ógjørligt at lata *provstirådvalgets endelige behandling af ... kirkekassernes årlige budget* fara fram á almennum fundum, tá bugsað verður um okkara oyggjasamfelag og ferðamøguleikar. **Stk 6:** Tí eigur "tað almenna" í stk 3 at verða strikað og bert stk 6 standa eftir.

Anordning om ikrafttræden for Færøerne
af lov om menighedsråd

§ 22,1 og 2 og 3 og 4: Tað er óheppið, at tey smáu kirkjuráðini skulu vera bundin av tílíkum fyriskipanum. Tað sama er at siga um § 23 um almennar fundir. Ásetanirnar eru alt ov ógvusligar fyri smáar søknir.

§ 27,1: Í princippinum skulu kirkjuráðini ikki viðgera mál viðvíkjandi grestagerðunum, tað ger stiftsstjórnin. Og um kirkjuráðini skulu viðgera mál viðvíkjandi innbúgvi v.m. í kontórinum, eigur prestur at kunna taka lut í *viðgerðini* av tílíkum málum.

Anordning om ikrafttræden for Færøerne
af biskopper og om stiftshåndsløsning

§ 4.1: Í mesta lagi 150 stillarar (sum í Danmark) er ov nógv. 100 hevði verið nóg mikið hóskandi. Tað sama eigur so eisini at verða broytt í tí tilsvarandi kunngerðini, § 5,3.

Anordning om ikrafttræden for Færøerne
af lov om begravelse og ligbrænding

§ 6,1: Um jarðarferðarmyndugleika. Tá ein danskari, sum býr niðri, doyr í Føroyum, skal andlátið

registrerast niðri, og presturin í søkunni, har hann deyði búði, er jarðarferðarmyndugleiki. Tað kemur fyri. Tað er meira vanligt, at ein føroyingur sum býr í Føroyum, doyr niðri. Men tá er tað er ógreitt, um andlátið skal registrerast her ella niðri, og um tað er presturin har, sum presónurin doyði, ella tað presturin á heimstaðnum í Føroyum, sum er jarðarferðarmyndugleiki. Hesi viðurskifti eiga at verða preciserað. Í hesum sambandi eigur at verða gjørt vart við sama problemið, tá føroyskar naamnur eiga niðri, t.d. á ríkishospitalinum. Tað eigur tí at verða tikið við.

§§ 7,8 og 11: Orðingin kirkelig begravelse og borgerlig begravelse er óprecis í føroyskum samanhangi. Somuleiðis en præst i et trossamfund uden for folkekirken. Skilnaðurin er ikki millum kirkelig og borgerlig, men heldur millum kirkelig og trossamfund uden for folkekirken. Hetta eigur at verða snøggað. Til. § 8,2: "Ved afgørelse af, om begravelseshandlingen skal være kirkelig, eller foregå under medvirken af medlemmer af et trossamfund uden for folkekirken eller være borgerlig, skal ønsker etc... Var afdøde ved sin død medlem af folkekirken eller tilhørte et trossamfund uden for folkekirken, anses dette som udtryk for et ønske om kirkelig begravelse, henholdsvis begravelse under medvirken af medlemmer fra afdødes trossamfund." Og § 11. Stk. 1 kann strikast. Stk 2 verða standandi. Stk 3: "Når medlemmer/ledere i et trossamfund uden for folkekirken medvirker etc..."

§ 16,2-5: Hesi fýra stykkini eiga at verða strikað á sama hátt, sum ásetanir um begravelsespladser í øðrum lógum eru strikaðar.

Vinarliga, fyri nevndina í prestafelagnum, Bjarni Bæk, fm
16. august 1996 F.L.j.nr.

f. Skriv frá felagnum fyri kirkjuráðslimir dagfest 28. februar 1996 til landsstýrið við ummæli til uppskotini frá kirkjumálaráðnum

Tórshavn 28 februar 1996
Føroya Landsstýrið, att: Sámal Petur í Grund, landsstýrismaður

Viðvíkjandi framløguni av nýggja lógarverkinum fyri Føroysku Fólkakirkjuna.

Okkum í nýggja Felagnum fyri kirkjuráðslimir er nýggjasta útkasti til broytingar í lógum fyri Fólkakirkjuna fyri fáum døgum komin í hendi. Frá landsstýrisskrivstovuni hava vit fingið upplýst, at hesar lógir skulu leggjast fyri løgtingið áðrenn 21. mars 1996, sum er seinasta freist fyri framløgu til vártingsetuna. Um hendan freist verður yvirhildin, skal landsstýrið hava møguligar viðmerkingar til lógirnar longu nú í komandi viku, mikudagin 6. mars. Vit, ið mynda felagið, halda hesar lógir vera sera umfatandi at fara ígjøgnum og meta okkum ikki at vera førar fyri at koma við teimum viðmerkingum og broytingaruppskotum, sum vit, aftaná skjóta gjøgnumlesan, mugu fáa høvi at koma við.

Um Felagið fyri kirkjuráðslimir er at siga, at felagið varð sett á stovn 23. september 1995 og hevur síðan fingið sera góða undirtøku millum kirkjuráðslimir um alt landið. Upplýsast kann, at av teimum umleið 400 kirkjuráðslimunum í landinum eru longu nú útvið 300 limir í felagnum. Hetta er at froast um og sigur okkum, at tørvurin fyri felagnum hevur verið stórur. Tað er soleiðis, at felagið skal hava sín fyrsta ársaðalfund 16. mars 1996.

Á ársaðalfundinum verður sjálvandi kunnað um fyristandandi broytingar í kirkjulógunum, sum hava stóran áhuga millum limir okkara.

Tá tíðin fyri, at landsstýrið skal hava broytingaruppskotini í hendi, er sera knapp, fara vit í fyrsta lagi at heita á landsstýrið, um tað er møguleiki fyri at fáa útsett hesa framløgu til ólavsøkutingsetuna, so betri møguleiki verður til at koma við viðmerkingum og broytingaruppskotum, sum felagið og limir tess meta vera neyðugar.

Í øðrum lagi, um hendan útsetan ikki letur seg gera, so at geva felagnum møguleika fyri at koma við viðmerkingum og boytingaruppskotum aftaná 16. mars, tá ársaðalfundurin er gjørdur kunnugur við hesar nýggju lógir.

Tá Felagið fyri kirkjuráðslimir longu nú umboðar stóran part av prestum og leikum fólkum, sum eru tilknýtt til fólkakirkjuna, so vóna vit, at hendan áheitan verður gingin okkum á møti.

Heilsan, vegna Felagið fyri kirkjuráðslimir, Niklas Foldbo, formaður. Per Jacobsen, næstformaður
7. mars 1996 F.L.j.nr. 2000-6/94

g. Skriv frá felagnum fyri kirkjuráðslimir dagfest 4. mars 1996 til landsstýrið við ummæli til uppskotini frá kirkjumálaráðnum

Felagið fyri Kirkjuráðslimir v/ Niklas Foldbo, 650 Torftir

Føroya Landsstýri, Tinganes, 100 Tórshavn

Vísandi til skriv tykkara frá 21.02.96 loyva vit okkum hervið at ummæla og gera viðmerkingar til uppskot til nýggja kirkjulóggávu fyri Føroyar.

Felagið fyri Kirkjuráðslimir varð stovnað 23.09.95. Í dag eru 285 limir skrásettir av teimum umleið 400 sitandi kirkjuráðslimunum í Føroyum.

Felagið hevur skipað fyri kunnandi fundum kring landið, har umleið 200 kirkjuráðslimir hava luttikið, og hvar høvuðsbroytingarnar í lógarverkitunum vóru viðgjørdar. Úrskurður úr fundarrøðini er niðurfeldur í niðanfyri skrivaðu viðmerkingar til lógarverkið, og eru eisini ávís dømi tikin við.

Ummæli:

1. Lov om folkekirkens økonomi (Fíggjarlógin) § 3 stk. 3 og § 18 stk. 2.:

Felagið tekur undir við felags kirkjuskattaprosenti til rakstur av kirkjuni.

2. Lov om folkekirkens økonomi (Fíggjarlógin) møguliga § 2b og § 3 stk.1.:

Semja var um, at kirkjurnar sjálvar varðveita persónliga givnar gávur.

3. Lov om folkekirkens økonomi (Fíggjarlógin) § 2 stk. 1 nr. 8,
Lov om ansættelse i stillingar i folkekirken m.v. (Setanarlógin) § 16.:

Semja um ikki at løna og seta kirkjutænarar í starv, men at finna eina hóskandi loysn fyri samsýning, ið verður ásett av landsstýrinum.

4. Lov om folkekirkens økonomi (Fíggjarlógin) § 19h stk. 3.:

Áhugi var fyri at seta á stovn ein tiltaksgrunn.

5. Lov om folkekirkens økonomi (Fíggjarlógin) § 19c stk. 1 og 2.:

Upphæddin til kirkjugrunnin á løgtingsins fíggjarlóg eigur at verða varðveitt.

6. Lov om folkekirkens økonomi (Fíggjarlógin) § 9 stk. 1.:

Í rokniskapi kirkjunnar eigur at vera pláss til status, so ognin hjá tí einstøku kirkjuni og hjá Føroya Kirkju kann gerast upp.

7. Lov om menighedsråd (Kirkjuráðslógin) kap. 4, millum annað § 23 stk. 1.:

Full semja var um ikki at hava almennar kirkjuráðsfundir.

8. Lov om menighedsråd (Kirkjuráðslógin) kap. 4, millum annað § 23 stk. 1.:

Mælt verður til at hava ein almennan fund um árið, har roknskapurin verður framlagdur, og greitt verður frá arbeiðinum hjá kirkjuráðnum.
Í øllum førum eigur roknskapurin at verða lagdur alment fram, t.d. í forkirkjuni.

9. Lov om ansættelse i stiftinger i folkekirken m.v. (Setanarlógin) kap. 3 § 14, cfr. kap. 2, kap. 4 og bekendtgørelse om menighedsråds medvirken ved ansættelse i præstestillinger (Kunngerð um luttøku av kirkjuráðum, tá ið prestar verða settir.): Semja er um, at kirkjuráðini skulu innstilla próstin til próstadømið á sama hátt sum prest til prestagjaldið.

10. Lov om menighedsråd (Kirkjuráðslógin) § 2 stk. 3.:

Við innstillan av sóknarpresti/dómprósti í Tórshavn og Klaksvík eigur hædd at verað tikin fyri skeivleikanum í verandi lóg, tí sum nú er, kunnu kirkjusóknir við sera fáum limum avgera innstillingina, meðan høvuðskirkjan við fleirfaldaðum fólkatali ikki fær samsvarandi ávirkan á avgerðina.

11. Lov om ansættelse i stillinger i folkekirken m.v. (Setanarlógin) § 1 stk. 1.:

Viðvíkjandi setan av prestum meta vit, at fólk við teologiskari universitetsútbúgving úr norðurlondum eiga at vera javnsett.

Viðmerkingar:

ad. 1.
Fyri samanhaldið og solidaritetin í fólkakirkjuni.
Fyri at tryggja og stoðla røkt av kirkjunum á smærru plássum.
Fyri hjálp til neyðugar ábøtur, ið smærri bygdir ikki megna at gera við lokalum kirkjuskatti.
Ásannast má, at umleið 85% av fólkakirkjulimunum í dag rinda kirkjuskatt, og at í fyriliggjandi uppskoti kann hvør kirkjusókn frítt taka støðu til, um hon vil vera í skattaskipanini ella standa uttanfyri.

ad 2.
Fyri at fólk skulu varðveita áhuga fyri at geva til kirkjuna, eiga slíkar gávur ikki at ávirka skattaálíkningina. Kirkjurnar eiga at varðveita verandi ognir sínar, tá nýggja skipanin kemur í gildi. Hesar vera at seta í grunn at nýta til kirkjuligt arbeiði.

ad. 3.
Full semja er millum limirnar um, at hin sjálvbodna tænastan hjá kirkjutænarunum hevur borið kirkjuni uppi, og hesa eiga vit at varðveita.
Stórur munur er á tænastuveitingunum á støðru og smærru plássunum uttanfyri vanligu heiligdagstænasturnar, og má finnast fram til eitta skipan at samsýna eftir í mun til hetta arbeiðið, møguliga í mun til fólkatali í kirkjusóknini. Eisini kann ein skipan við fleiri kirkjutænarum minka um tørvin fyri samsýning.

Landsstýrismaðurin ger leiðbeinandi reglugerð, og Felagið fyri Kirkjuráðslimir vil fegin vera við til at finna fram til eina skipan.

ad. 4.
Tiktaksgrunnurin kann t.d. fíggjast við, at 0,05% verðu løgd oman á líkningina, inntil grunnurin hevur fingið eina ávísa stødd. Grunnurin skal gjalda bráðfeingis ákomnar útreiðslur, ið vanliga álíkningin ikki megnar. Møguliga kann hann eisini nýtast til at javna út størri frávik í líkningini frá einum ári til annað.

ad. 5.
Upphæddin á løgtingsins fíggjarlóg eigur lutfalsvís at vera á sama støði, sum hon var árini 1988 - 90. Allir landsins borgarar fáa ókeypis tænastuveitingar av ymiskum slagi frá kirkjuni.

ad. 6.
Samfelagsskipanin krevur, at fíggjarligu viðurskiftini hjá kirkjuni kunnu greinast út. Tí eigur at skipast fyri eini virðismetan av kirkjubygningunum í sambandi við sýnið.

ad. 7.
Kirkjan er gjøgnum øldir borin uppi og varðveitt við sjálvboðnum arbeiði og tænarum.
70 - 80 % av øllum guðstænastum fara fram, uttan at prestur ella tænastumaður luttekur í henni, - dekna guðstænastur.
Av teimum 60 kirkjuráðunum í landinum hava 50 - 55 av teimum sínar fundir í privatum heimum. Tað er heilt óhugsandi og fremmandagerðan av kirkjuligum arbeiði at krevja, at ein og hvør skal hava atgongd til hesi heim til eina og høvrja málsviðgerð, ella í mótsatta lýri at krevja nevndu 50 - 55 kirkjuráð at halda sínar fundir í skúla ella samkomuhúsi við almennari áskoðaratjøld.
Yvirhøvur kann avleiðingin eisini getast, at fólk ikki vilja taka sæti í kirkjuráðunum við hesi fremmandagerðan av kirkjuliga arbeiðinum.

ad. 8.
Í staðin fyri almennar fundir eigur heldur at verða hildin ein almennur fundur um árið, har greitt verður frá kirkjuliga arbeiðinum og roknskapinum.
Ársroknskapurin kann liggja frammi í kirkjuni í t.d. ein mánað.

ad. 9.
Tá havt verður í huga, at kirkjuráðini innstilla prest, dómprást og biskup, so tykist tað bæði ótíðarbóskandi og ódemokratiskt, at ikki sama er galdandi fyri setan av prásti.

ad. 10.
Við innstillan av sóknarpresti / dómprásti í eystara prestagjaldi í Tórshavn er stuðan tann, at 12 kirkjuráðslimir í Kaldbak og í Nólsoy, ið bert umboða sløk 400 fólk, kunnu avgera innstillingina móti teimum 11 kirkjuráðslimunum við dómkirkjuna, ið umboða, umleið 7.500 fólk í Tórshavn. Sama er galdandi fyri innstillan av sóknarpresti við Vesturkirkjuna og Christianskirkjuna.
Hetta kemst av tí ósamsvarandi tali av limum í kirkjuráðunum, har lítið fólk býr, og teimum størru plássunum.

Fyri eini rættari ávirkan hjá kirkjuráðslimunum eru tveir møguleikar:
1) at talið á kirkjuráðslimunum samsvarar limunum í kirkjusóknini, ella
2) at atkvøðan hjá kirkjuráðslimunum vigar ymiskt í mun til fólkatalið í kirkjusóknini.

7. mrts. 1996
F.L.j.nr. 2000 6/94

h. Skriv frá felagnum fyri kirkjuráðslimir dagfest 7. juni 1996 til landsstýrið við fskoyti til skrivið 4. februar

1996 til landsstýrið við tilhoyrandi skrivi frá kirkjuráðnum í Kaldbak til felagið fyri kirkjuráðslimir dagfest 5. mai 1996

Felagið fyri Kirkjuráðslimir, 650 Toftir
Føroya landsstýri, Tinganes, 100 Tórshavn
Toftir 7. juni 1996

Viðv. viðmerkingum til uppskot til nýggja kirkjufóggávu.

Sum ískoyti til skriv okkara frá 4. februar 1996 skal nevnast, at skrivið hevur fingið hesar viðmerkingar:

1. Lov om folkekirkens økonomi § 3 stk. 3. og § 18 stk. 2.

Kirkjuráð umboðandi umleið 21% av fólkatalinum í landinum taka ikki undir við einum felags kirkjuskattaprosenti, men at álíknað verður fyri hvørja kirkju sær eftir tørvi.
Kortini eru tey øll fyri kirkjuskatti.

2. Lov om folkekirkens økonomi § 19 b stk. 3.

Tikið verður serliga undir við einum tiltaksgrunni.

Sum heild verður tikið undir við øllum tí, sum framført verður í skrivinum. Um landsstýrið ynskir at skifta orð við felagið um eitthvørt í lógarverkinum, so eru vit altíð fúsir at møta til fundar.

Við heilsan vegam felagið
Niklas Foldbo form.

10. juni 1996
F.L.j.nr. 2000 - 6/94

1. viðgerð 7. oktober 1997. Uppskotið varð beint í mentanarnevndina, sum tann 19. december 1997 legði fram soljóðandi

Álit

Málið er lagt fram av landsstýrinum tann 30. september 1997 og eftir 1. viðgerð tann 7. oktober 1997 beint í mentanarnevndina.

Mentanarnevndin hevur viðgjørt málið á fundum 27. oktober, 31. oktober, 3. november, 11. november, 20. november, 24. november, 27. november, 1. december, 9. december og 11. december.

Nevndin hevur undir viðgerðini havt fund við umboð fyri Føroya Stiftsstjórn, ið hevur hildið eina fyrilestur um kirkjulógirnar, umboð fyri starvsfólk, umboð fyri kirkjuráðslimir, umboð fyri Prestafelagið, Dómpróstin, Bispin, landsstýrismannin og umboð fyri Gøtu Kommunu.

Nevndin hevur undir viðgerðini móttikið skriv frá Føroya Stiftsstjórn, umboðum fyri starvsfólk, felagnum fyri kirkjuráðslimir, Prestafelag Føroya, Dómpróstinum, Den danske Præsteforening og frá Hans Trúgva Teitrin sum advokatur hjá Gøtu Kommunu.

Viðlagt álitinum er yvirlit yvir bygnaðarskipan fyri føroysku kirkjuna, ið nevndin hevur fingið frá stiftsstjórnini.

Meirlutin í mentanarnevndini (Bjarni Djurholm, Lisbeth Petersen, Maria Hansen og Lasse Klein) mælir løgtinginum til at samtykkja uppskotið við ávísum niðanfyri tilmæltum broytingunt.

Lasse Klein skal tó viðmerkja, at hann hevur ikki verið partur av viðgerðini, orsakað av, at hann nústani er vorðin limur í mentanarnevndini, og at møguligar viðmerkingar verða at fara fram, tá málið kemur til 2. viðgerð.

Ein **minniluti í mentanarnevndini** (Signar á Brúnni) tekur ikki undir við uppskotinum, men mælir til, at alt málið verður tagt í nevnd í sambandi við viðgerð av uppskoti um yvirtøku av fólkakirkjuni, sbr. løgtingsmáli nr. 20/1997. Minnilutin er ótryggur við fyriliggjandi lógaruppskot við tað, at so nógvar atfinningarsamar viðmerkingar eru komnar frá teimum, ið hava verið á fundi við nevndina. Minnilutin vísir annars til sínar viðmerkingar í løgtingsmáli nr. 20/1997, uppskot til løgtingslóg um fyritreiking av yvirtøku fólkakirkjunnar.

Ein **annar minniluti í mentanarnevndini** (Jógvan Adolf Johannessen) tekur støðu í tingsalinum og vísir annars til uppskot Javnaðarfloksins um setan av sjómmálanevnd.

Ein **triði miuniluti í meutanarnevndini** (Jenis av Rana) tekur støðu til uppskotið í tingsalinum.

Meirilutin (Bjarni Djurholm, Lisbeth Petersen, Maria Hansen og Lasse Klein) setir fram soljóðandi

h r o y t i n g a r u p p s k o t

I. Í uppskotinum ganga út orðini »við broytingum landsstýrisins«

II. Í skjalinum til uppskotið, uppskot til »anordning om ikrafttræden på Færøerne af lov om ansættelse i stillinger i folkekirken m.v. » verða gjørdar hesar broytingar:

1) Í § 1, stk. 1, verða orðini »fra et dansk universitet« strikað.

2) Í § 7 verða orðini »fra et dansk universitet« strikað.

3) Í 11. stk. 3. verður punktum sett eftir orðið »præstegældet«.

4) § 12, stk. 1, nr. 2, verður orðað soleiðis:

»2) der ved afstemning på et efterfølgende menighedsmøde for hele præstegældet afgives 2/3 af stemmerne for ansættelse af den pågældende.«

5) § 14 verður orðað soleiðis:

»§ 14. Biskoppen afholder et møde med provstiets menighedsråd, hvor de indkomne ansøgninger til den ledige stilling som provst gennemgås. På et møde, der afholdes af menighedsrådene alene senest 3 uger efter det første møde, afgiver menighedsrådene en udtalelse om mindst 3 ansøgere, opstillet i prioriteret rækkefølge.

Stk. 2. Biskoppen afgiver udtalelse om mindst 3 ansøgere, opstillet i prioriteret rækkefølge. Biskoppen er frit stillet med hensyn til, hvilke ansøgere han vil udtale sig om. Biskoppen sender ansøgningerne med menighedsrådenes og sin egen udtalelse til Kirkeministeriet.

Stk. 3. Kirkeministeren træffer afgørelse om, hvilken ansøger der skal indstilles til kgl. udnævnelse.«

6) Yvirskriftin til Kapitel 5 verður orðað soleiðis: »Medarbejdere ved kirken«.

7) Í § 16 verður sum nýtt stk. 2 sett:

»Stk. 2 Ved kirker, som har et befolkningsgrundlag på over 2000, kan menighedsrådet træffe afgørelse om ansættelse af en kontormedhjælper og en organist.«

8) § 24 verður strikað og sett verða orðini: »(udgår)«

9) § 25, stk. 1, verður orðað soleiðis:

»Anordningen træder i kraft 1. januar 1999.«

Viðmerkingar

Viðv. 1) Nevndin heldur, at tilmæli heimastýrisins til ríkismyndugleikarnar, soleiðis sum tað verður samtykt av løgtinginum og staðfest av løgmanni, skal verða samanskrivað í einum skjali, nevnifiga í einum samanskrivaðum uppskoti til kgl. fyriskipan um at seta í gildi fyri Føroyar lóg um setan í støv innan fólkakirkjuna

v.m., har uppskot kirkjumálaráðsins, broytingaruppskot landsstýrisins og uppskot nevndarinnar verða samanskrivnð í eitt samlað uppskot.

Viðv. II) 1). Meirilutin metir, at orðingin av § 1 eigur at verða víðari. Sum nú er, útilokar orðingin, at aðrir kvalifiseraðir persónar enn prestar við útbúgving frá donskum universiteti kunnu setast í prestastarv.

Sambært áseting í lóg nr. 195, af 16.04.1941 om Adgang til Præsteembeder i Folkekirken, við seinni broytingum, er í dag einki krav um, at persónar fyri at kunna verða settir í prestastarv innan fólkakirkjuna skulu hava staðið teologiska kanditateksamiu frá einum donskum universiteti. Tað er nóg mikið, at viðkomandi hevur staðið eina teologiska kandidateksamiu.

Viðv. II) 2). Sí viðmerkingarnar til II), 1).

Viðv. II) 3). -4) Hetta eru uppskot landsstýrisins, sum verða førd inn í uppskotið til kgl. fyriskipan.

Viðv. II) 5) Hetta er uppskot landsstýrisins, sum verður **ført** inn í uppskotið til kgl. fyriskipan. Circinin er tó rættað frá grein 14, til grein 15.

Viðv. II) 6). Hetta er uppskot landsstýrisins, sum verður ført inn í uppskotið til kgl. fyriskipan.
Viðv. II) 7). Heimild verður givin at seta skrivstovufólk og organist í starv við kirkju, har talið av persónum, sum búgva í kirkjusóknini, fer upp um 2.000

Viðv. II) 8) -9). Hetta eru uppskot landsstýrisins, sum verða førd inn í uppskotið til kgl. fyriskipan.

Verandi bygnaðarskipan fyri føroysku kirkjuna

Kirkjumálaráðið — Landsstýrið/Løgtingið

Stiftsstjórnin — Kirkjustjórnin

Kirkjuráðini — Kirkjuráðini

Møgulig framtíðar bygnaðarskipan fyri føroysku kirkjuna

Landsstýrið /Kirkjumálaráðið

Stiftsstjórnin

Próstadømisráðini

Kirkjuráðini

Stiftsstjórnin: biskupurin, ríkisumboðsmaðurin, og landsstýrismaðurin í kirkjumálum ella ein persónur, sum landsstýrismaðurin tilnevnir. Sí lóg nr. 729 frá 6. november 1990 um Føroya stiftsstjórn § 4. Stiftsstjórnin hevur um hendur prestaumsitingina, løn og prestagarðar og virksemið hjá krikjuráðunum. Pengarnir stava frá danska landskirkjuskattinum (fællesfonden) og danska statinum (løn til biskupin, og 40% av lønunum hjá prestunum).

Kirkjustjórnin: amtmaðurin (ríkisumboðsmaðurin), prósturin og trý fólk, sum løgtingið velur við lutfalsvali. Sí lóg nr. 109 fra29. mai 1924 fyri Føroyar um stjórn kirkjunna, sum hon er broytt við lóg nr. 192 frá 11

mai. 1935 § 2. Kirkjustjórnin veitir stuðul til viðlíkahald av kirkjum og til nýbygging, ásetir, hvussu stóra upphædd, kirkjuráðini kunnu nýta sum tiltøkupening (rådighedsbeløbet v.m.) og hevur umsjón við kirkjum og kirkjugørðum (kirkjusýn og próstasýn). Kirkjustjórnin góðkennir fíggjarætlanir og roknskapir hjá kirkjunum. Pengarnir stava frá kirkjugrunninum (játtan hvørt ár í løgtingsins fíggjarlóg).

Próstadømisráðið: prósturin og 2-4 limir, sum verða valdir 4. hvørt ár av kirkjuráðslimunum í próstadøminum. Ein og hvør, sum lýkur treytirnar at verða vidur sum krikjuráðslimur í próstadøminum, kann veljast. Sí uppskot til fíggjarlóg fyri fólkakirkjuna § 24 stk. 1. Arbeiðsøkið hjá próstadømisráðnum verður ásett í einari kunngerð, sum landsstýrismaðurin í kirkjumálum sendir út. Próstadømisráðið hevur umsjón við kirkjuráðnum og skal í Danmark hoyrast í málum um keyp og sølu av fastari ogn, í málum um at byggja ella ríva niður bygningar, í málum um viðlíkahald og umbygging og í øðrum málum, sum hava fíggjarligan týdning fyri kirkjukassarnar. Próstadømisráðið skipar eisini fyri "buget"samráð einaferð um árið, har kirkjuráðini samráðast við próstadømisráðið um líkningaruppheddirnar til kirkjukassarnar. Pengarnir til umsitingina stava frá danska landskirkjuskattinum (fællesfonden).

Kirkjuráðini: í minsta lagi 6 limir (6 limir fyri teir fyrstu 1000 kirkjulimirnar í søknini, og ein limur fyri hvørjar eyka 1000 kirkjulimir, tó ikki fleiri enn 15 í alt). Limirnir verða valdir 4. hvørt ár. Søknarpresturin eru fastir limir í kirkjuráðnum. Sí fyriskipan nr. 232 frá 25. mai 1981, sum setir í gildi fyri Føroyar lóg um kirkjuráð § 2, stk. 1. Kirkjuráðini hava umsjón við kirkjuni. Tey taka lut í setan av prestum og setan og uppsøgn av kirkjutænarum og taka milhun annað avgerð um, hvørt kontirmatión bert skal vera eina ferð um árið. Tey taka avgerð um ritualir og umsita talvupening. Pengarnir stava frá lokalum kirkjuskatti og innsavningum.

2. viðgerð miknudagin 14. januar 1998. Broytingaruppskot I samtykt 16-5-0. Broytingaruppskot II til §§ 1 og 7 fall 1-1-19. Broytingaruppskot II til §§ 11, 12, 14, 16, 24 og 25 samtykt 11-1-8. Uppskotið soleiðis broytt samtykt 11-1-8. At uppskotið soleiðis samtykt kann fara til 3. viðgerð samtykt 11-1-8.

3. viðgerð týsdagin 20. januar 1998. Løgtingsmenninir Bjarni Djurholm, Lisbeth L. Petersen, Maria Hansen og Lasse Klein løgdu fram soljóðandi:

Broytingaruppskot

§ 1 stk. 1 í uppskotinum verður soljóðandi:

»I præstestillinger i folkekirken kan ansættes:

1) personer, der har bestået teologisk kandidateksamen fra et dansk universitet,
2) personer, der har virket som præst i den grønlandske kirke, og som har bestået den af Landstinget i Grønland forordnede videregående uddannelse i kristendomskundskab, samt behersker det færøske eller det danske sprog, og
3) personer, der i mindst 7 år har virket som præst for evangelisk-lutherske frimenigheder, der opfylder betingelserne for at få folkekirkens kirker overladt til brug, hvis biskoppen i det stift, hvor vedkommende senest har virket som frimenighedspræst, anbefaler dette.«

Viðmerking

Orðaljóðið í greinini er hitt sama sum samtykt við 2. viðgerð. Av misgáum eru tølini fyri einstøku liðini í greinini fallin burtur, og tey verða sett inn av nýggjum.

20. januar 1998 løgdu løgtingsmenninir Lasse Klein, Bjarni Djurholm, Eydun Videro og Lisbeth L. Petersen fram soljóðandi:

Broytingaruppskot

§ 16 stk. 2 í uppskotinum verður soljóðandi:

»Stk. 2 Ved kirker, som har et befolkningsgrundlag på over 2000, kan menighedsrådet træffe afgørelse om ansættelse af en kontormedhjælper, en kirketjener og en organist.«

Viðmerking
Í teim størru kirkjunum sum t.d. Christianskirkjuni fer okkurt fram meiri enn annan hvønn dag í árinum, umframt arbeiði at gera uttan um kirkjuna. Har er neyðugt at hava løntan kirkjutænara, og tí verður skotið upp, eisini at heimila, at løntur kirkjutænari verður settur.

Broytingaruppskotið til § 1 samtykt 14-10-0. Broytingaruppskotið til § 16 samtykt 14-9-1. Uppskotið, sum samtykt við 2. viðgerð og broytt við 3. viðgerð, endaliga samtykt 14-2-7.

Ríkislógartilmæli, 28.01.1998
K.L.j.nr. 2000-12/96

12 Uppskot til ríkislógartilmæli um at seta í gildi fyri Føroyar lóg um tilnevning av bispum og biskupsdømisskifti

Ár 1997, týsdagin 30. september, legði Ivan Johannesen, landsstýrismaður, vegna Sámal Petur í Grund, landsstýrisnam, vegna landsstýrið, fram soljóðandi:

U p p s k o t
til
ríkislógartilmæli

Mælt verður ríkismyndugleikanum til at seta í gildi fyri Føroyar hjálagda uppskot til kongliga fyriskipan um gildisseting fyri Føroyar av lóg um tilnevning av bispum og biskupsdømisskifti við broytingum frá landsstýrinum.

Viðmerkingar
Kirkjumálaráðið hevur sent landsstýrinum hjálagda uppskot til kongligt fyriskipan, sum setir í gildi fyri Føroyar lóg nr. 238 frá 4. juni 1980 um tilnevning av bispum og biskupsdømisskifti við seinni broytingum. Umsitingin hjá landsstýrinum hevur viðgjørt uppskotið og gjørt onkrar smávegis broytingar til uppskot kirkjumálaráðsins, so sum tilskilað er niðanfyri.

Í 1990 gjørdist Føroyar sjálvstøðugt biskupsdømi við egnari stiftsstjórn. Í lóg nr. 729 frá 6. november 1990 um skipan av biskupsdømi Føroya stendur í § 2, stk. 3, at kirkjumálaráðharrin kann gera av, at reglurnar í lóg um tilnevning av bispum og biskupsdømisskifti skulu vera galdandi fyri biskupsdømi Føroya, og kann eftir tilmæli frá landsstýrinum áseta broytingar í reglunum í tráð við serlig føroysk viðurskifti. Framman fyri standandi áseting varð nýtt, tá bispaval var í Føroyum í 1990, og vórðu tá donsku reglurnar á økinum nýttar.

Landsstýrið heldur tað vera skilabetri at seta lógina um tilnevning av bispum og biskupsdømisskifti í gildi fyri Føroyar, heldur enn at nýta donsku reglurnar beinleiðis.

Uppskotið fær ongar fíggjarligar avleiðingar fyri landskassan, av tí at útreiðslurnar verða goldnar av »Fællesfonden« í Danmark.

Umframt sjálvt uppskotið til kongliga fyriskipan eru eisini lagdar við viðmerkingar og viðmæli frá stiftsstjórn, kirkjustjórn, prestafelagnum og felagnum av kirkjuráðslimum.

Landsstýrið mælir løgtinginum til at samtykkja, at kongliga fyriskipanin við broytingum landsstýrisins, sum setir í gildi fyri Føroyar lóg um tilnevning av bispum og biskupsdømisskifti, verður sett í gildi, sum niðanfyri tilskilað.

Skjalayvirlit í málinum:

Skjal 1 Uppskot frá kirkjumálaráðnum til kongaliga fyriskipan um at seta í gildi fyri Føroyar lóg u tilnevning av bispum og biskupsdømisskifti við viðmerkingum.
Skjal 2 Broytingaruppskot landsstýrisins við viðmerkingum.
Skjal 3 Fylgiskjøl frá kirkjumálaráðnum.
a. Forslag til lov om udnævnelse af biskopper og stiftsbåndsløsning
b. Betænkning over forslag til lov om udnævnelse af biskopper og om stiftsbåndsløsning
c. Lov nr. 238 af 4. juni 1980 om udnævnelse af biskopper og om stifsbåndsløsning
d. Forslag til lov om ændring af lov om udnævnelse af biskopper og stiftsbåndsløsning
e. Betænkning over forslag til lov om ændring af lov om udnævnelse af biskopper og om stiftsbåndsløsning
f. Lov nr. 434 af 1. juni 1994 om ændring af lov om udnævnelse af biskopper og stiftsbåndsløsning
g. Bekendtgørelse nr. 511 af 16. juni 1994 af lov um udnævnelse af biskopper og om stiftsbåndsløsning
h. Forslag til lov om oprettelse af Færøernes stift
i. Betænkning over forslag til lov om oprettelse af Færøernes stift
j. Lov nr. 729 af 6. novmeber 1990 om oprettelse af Færøernes Stift

Skjal 4 Viðmerkingar hjá stiftsstjórn, kirkjustjórn, prestafelagnum og felagnum av kirkjuráðslimum.
a. Skriv frá Føroya Stiftsstjórn 1. mars 1996 til landsstýrið við ummæli til uppskotini frá kirkjumálaráðnum
b. Skriv frá Føroya Stiftsstjórn 12. august 1996 til landsstýrið við ummæli til uppskotini frá kirkjumálaráðnum.
c. Skriv frá Føroya Kirkjustjórn 5. mars 1996 til landsstýrið við ummæli til uppskotini frá kirkjumálaráðnum
d. Skriv frá Føroya Kirkjustjórn 12. august 1996 til landsstýrið við ummæli til uppskotini frá kirkjumálaráðnum
e. Skriv frá prestafelagnum 14. august 1996 til landsstýrið við ummæli til uppskotini frá kirkjumálaráðnum við tilhoyrandi skjali dagfest 11. mars 1996
f. Skriv frá felagnum fyri kirkjuráðslimir dagfest 28. februar 1996 til landsstýrið við ummæli til uppskotini frá kirkjumálaráðnum
g. Skriv frá felagnum fyri kirkjuráðslimir dagfest 4. mars 1996 til landsstýrið við ummæli til uppskotini frá kirkjumálaráðnum
h. Skriv frá felagnum fyri krikjuráðslimir dagfest 7. juni 1996 til landsstýrið við ískoyti til skrivið 4. februar 1996 til landsstýrið við tilhoyrandi skrivi frá kirkjuráðnum í Kaldbak til felagið fyri kirkjuráðslimir dagfest 5. mai 1996

Skjal 1 Anordning om ikrafttræden på Færøerne af lov om udnævnelse af biskopper og om stiftsbåndsløsning

Anordning om ikrafttræden på Færøerne af lov om udnævnelse af biskopper og om stiftsbåndsløsning

VI MARGRETHE DEN ANDEN, af Guds Nåde Danmarks Dronning, gør vitterligt:
I medfør af § 10 i lov om udnævnelse af biskopper og om stiftsbåndsløsning, jf. lovbekendtgørelse nr. 511 af 16. juni 1994, og § 2, stk. 3, i lov nr. 729 af 6. november 1990 om oprettelse af Færøernes Stift, bestemmes, at lov om udnævnelse af biskopper og om stiftsbåndsløsning skal gælde for Færøerne i følgende affattelse:

Udnævnelse af biskopper

§ 1. Til biskop kan kun udnævnes personer, der har bestået teologisk kandidateksamen fra et universitet i Danmark og opfylder betingelserne for at blive ansat som præst i folkekirken.

§ 2. Inden en stilling som biskop besættes, afholdes en afstemning i overensstemmelse med reglerne i §§ 3-6.

§ 3. Stemmeberettigede er medlemmer af stiftets menighedsråd. Endvidere har tjenestemandsansatte præster samt overenskomstansatte præster, hvis ansættelse har en varighed af et år eller mere, der er ansat af kirkeministeren, og som ikke er medlem af noget menighedsråd, stemmeret i forbindelse med valg af den tilsynsførende biskop.
Stk. 2. Stemmeberettiget er tillige repræsentanter for valgmenigheder, der har hjemsted i stiftet, og valgmenighedspræster, der er stadfæstet som præst for en valgmenighed i stiftet. De stemmeberettigede repræsentanters antal fastsættes for de enkelte valgmenigheder af valgbestyrelsen til 6 for de første 1000 medlemmer af valgmenigheden, heri medregnet børn under 18 år, og yderligere et medlem for hvert påbegyndt 1000, dog ikke over 15 i alt. Repræsentanterne udpeges af valgmenigheden.
Stk. 3. En præst, der er medlem af flere menighedsråd, er kun stemmeberettiget i et af dem. En præst, der har flere af de i stk. 1, 2. pkt., nævnte ansættelser, har kun een stemme. En valgmenighedspræst, der er stadfæstet som præst for flere valgmenigheder i stiftet, er kun stemmeberettiget i en af disse.

§ 4. Kirkeministeriet fastsætter en frist for anmeldelse af kandidater ved afstemningen. Anmeldelsen, der indgives til vedkommende stiftsøvrighed, skal være underskrevet af mindst 50, højst 150 stemmeberettigede stillere og skriftligt tiltrådt af den opstillede kandidat. Den, der er stiller for flere kandidatlister, kan ikke anses for stiller for nogen af listerne. En kandidat kan ikke være stiller for en kandidatliste, hvorpå den pågældende selv er opført som kandidat.
Stk. 2. Der vælges et valgudvalg på 3 medlemmer blandt provstiudvalgsmedlemmerne i Færøernes stift, som sammen med stiftsøvrigheden udgør valgbestyrelsen. Stemmeberettigede ved valg af valgudvalget er kun de valgte medlemmer af provstiudvalgene. Kirkeministeren fastsætter nærmere regler for valg af valgudvalget og fastsætter, hvilke opgaver udvalget og valgbestyrelsen skal varetage.
Stk. 3. Klager over valgbestyrelsens afgørelser, herunder klager over valget, kan indbringes for kirkeministeren og skal være kirkeministeren i hænde senest ugedagen efter, at valgbestyrelsens afgørelse er meddelt klageren.

§ 5. Stemmeafgivningen foregår ved urafstemning blandt de stemmeberettigede.
Stk. 2. Kirkeministeren fastsætter nærmere regler om gennemførelse af afstemningen.

§ 6. Er der kun opstillet to kandidater, skal kirkeministeren indstille den kandidat, der har fået flest stemmer, til kgl. udnævnelse. Hvis stemmerne står lige, afgør kirkeministeren, hvem af de to kandidater der skal indstilles til kgl. udnævnelse.
Stk. 2. Er der opstillet flere end to kandidater, skal kirkeministeren indstille den af kandidaterne, der ved afstemningen har fået over halvdelen af de afgivne stemmer, til kgl. udnævnelse. Har ingen af kandidaterne opnået over halvdelen af de afgivne stemmer, foretages omvalg mellem de to kandidater, der ved afstemningen har fået flest stemmer, således at det ved stemmelighed afgøres ved lodtrækning, på hvilke to kandidater der skal stemmes. Lodtrækningen foretages af valgbestyrelsen. Den kandidat, der ved anden afstemning opnår flest stemmer, skal af kirkeministeren indstilles til kgl. udnævnelse. Hvis stemmerne ved anden afstemning står lige, afgør kirkeministeren, hvem af de to kandidater der skal indstilles.

§ 7. Omkostningerne ved afstemningens gennemførelse afholdes af fællesfonden.

Stiftsbåndsløsning

§ 8. En sognemenighed eller valgmenighed kan ved stiftsbåndsløsning slutte sig til en anden biskop, som er villig til at modtage den. Denne biskop overtager da tilsynet med menigheden for så vidt angår prædikeembedet, sakramenternes forvaltning og sjælesorgen.
Stk. 2. Stiftsbåndsløsning kan tidligst finde sted 1 år efter bispestillingens besættelse.
Stk. 3. Beslutning om stiftsbåndsløsning skal være vedtaget på et menighedsmøde med tre fjerdedele af de afgivne stemmer og være tiltrådt af menighedens præst eller en af dens præster.

Ikrafttrædelsesbestemmelser

§ 9. Anordningen finder anvendelse på bispevalg, hvortil kirkeministeren indkalder kandidatanmeldelser den eller senere.

Stk. 2. (udgår)

§ 10. (udgår)

Skjal 2 Landsstyrets forslag til ændringer til Kirkeministeriets forslag

Bemærkninger til forslaget

I. Almindelige bemærkninger

Forslaget til anordning om ikrafttræden på Færøerne af lov om udnævnelse af biskopper og om stiftsbåndsløsning svarer med ganske få ændringer til den i Danmark gældende lov om udnævnelse af biskopper og om stiftsbåndsløsning, jf. lovbekendtgørelse nr. 511 af 16. juni 1994.

Lov om udnævnelse af biskopper og om stiftsbåndsløsning er oprindeligt fra 1980 (lov nr. 238 af 4. juni 1980). I forbindelse med vedtagelsen af lov nr. 434 af 1. juni 1994 om ændring af lov om udnævnelse af biskopper og om stiftsbåndsløsning blev afstemningsmåden ændret således, at afstemningen i forbindelse med bispevalg foretages som en urafstemning blandt de stemmeberettigede. Endvidere blev der med den nævnte ændringslov indføjet en bestemmelse om, at der ved et bispevalg, hvor der er opstillet mere end to kandidater og hvor ingen af kandidaterne får mere end 50 % af de afgivne stemmer ved første afstemning, foretages omvalg mellem de to kandidater, der har fået flest stemmer ved første afstemning.

Med vedtagelsen af lov nr. 729 af 6. november 1990 om oprettelse af Færøernes Stift blev stillingen som vicebiskop for Færøerne omdannet til en stilling som biskop over Færøerne. Stillingen blev efter loven besat med vicebiskoppen, og i lovens § 2, stk. 3, blev indsat en bestemmelse om, at kirkeministeren kunne bestemme, at reglerne i lov om udnævnelse af biskopper og om stiftsbåndsløsning skulle finde anvendelse for Færøernes Stift med de ændringer, som de særlige færøske forhold tilsiger. Denne hjemmel er ikke udnyttet, og der gælder således for øjeblikket ingen regler om, hvorledes stillingen som biskop over Færøerne skal besættes i fremtiden.

Forslaget, der har været til høring hos stiftsøvrigheden over Færøernes Stift, medfører ingen økonomiske eller administrative konsekvenser for Det færøske Hjemmestyre.

II. Bemærkninger til forslagets enkelte bestemmelser

Der henvises til bemærkningerne til de lovforslag, der blev vedtaget som henholdsvis lov nr. 238 af 4. juni 1980 og lov nr. 434 af 1. juni 1994. Lovforslagene, betænkningerne fra Folketingets kirkeudvalg, samt de vedtagne love er vedlagt som kopi.

Nedenfor er knyttet bemærkninger til de bestemmelser, hvori der er foretager ændringer under henvisning til de særlige færøske forhold.

Til § 1

Den danske lovs bestemmelse om, at en biskop skal være teologisk kandidat fra et universitet »her i landet« kan give anledning til fortolkningstvivl. Med forslaget præciseres det derfor, at en person, kun kan udnævnes til biskop, såfremt vedkommende har bestået teologisk kandidateksamen fra et universitet i Danmark, og i øvrigt opfylder betingelserne for at blive ansat som præst i folkekirken.

Det er ikke for øjeblikket muligt at tage en teologisk kandidateksamen på Færøerne, hvilket er begrundelsen for, at denne mulighed ikke er nævnt i bestemmelsen.

Til § 4

Ved bispevalg har valgte medlemmer af stiftets menighedsråd samt præster, som i kraft af deres ansættelse er medlemmer af et menighedsråd i stiftet, stemmeret. Endvidere har personer, som af kirkeministeren er ansat i en præstestilling med en varighed af et år eller mere, og hvor ansættelsen ikke er knyttet til noget pastorat, stemmeret, såfremt den pågældende er undergivet tilsyn af biskoppen over Færøernes Stift. Endelig har repræsentanter for valgmenigheder, der har hjemsted i stiftet, og valgmenighedspræster, der er stadfæstet som præst for en valgmenighed i stiftet, stemmeret.

Under hensyn til at kredsen af stemmeberettigede således er begrænset, foreslås det, at en kandidat kan blive opstillet, hvis blot 50 stemmeberettigede stillere ønsker det.

Landsstyrets forslag til ændring til Kirkministeriets forslag

Lov om udnævnelse af biskopper og stiftsbåndsløsning

a) § 9, stk. 1: Anordningen finder anvendelse på bispevalg, hvortil kirkeministeren indkalder kandidatanmeldelser den 1. januar 1999 eller senere.

Bemærkninger til landsstyrets ændringsforslag

a) Landsstyret foreslår, at anordningen finder anvendelse på bispevalg hvortil kirkeministeren indkalder kandidatanmeldelser den 1. januar 1999 eller senere.

1. viðgerð 7. oktober 1997. Uppskotið vurð beint í mentanarnevndina, sum tann 19. desember 1997 legði fram soljóðandi

Álit

Málið er lagt fram av landsstýrinum tann 30. september 1997 og eftir 1. viðgerð tann 7. oktober 1997 beint í mentanarnevndina.

Víst verður til almennu viðmerkingarnar til løgtingsmáli nr. 11/1997: Uppskot til ríkislógartilmæli um at seta í gildi fyri Føroyar lóg um setan í støv innan fólkakirkjuna v.m.

Meirlutin í mentanarnevndini (Bjarni Djurholm, Lisbeth Petersen, Maria Hansen og Lasse Klein) mælir løgtinginum til at samtykkja uppskotið við ávísum niðanfyri tilmæltum broytingum.

Lasse Klein skal tó viðmerkja, at hann hevur ikki verið partur av viðgerðini, orsakað av at hann nústani er vorðin limur í mentanarnevndini, og at møguligar viðmerkingar verða at fara fram, tá málið kemur til 2. viðgerð.

Ein **minniluti í mentanarnevndini** (Signar á Brúnni) tekur ikki undir við uppskotinum, vísandi til viðmerkingar sínar í løgtingsmáli nr. 11/1997.

Ein **annar minniluti í mentanarnevndini** (Jógvan Adolf Johannessen) tekur støðu í tingsalinum og vísir annars til uppskot Javnaðarfloksins um setan av stjórnmálanevnd.

Ein **triði minniluti í mentanarnevndini** (Jenis av Rana) tekur støðu til uppskotið í tingsalinum.

Meirlutin í nevndini (Bjarni Djurholm, Lisbeth Petersen, Maria Hansen og Lasse Klein) setir fram soljóðandi

broytingaruppskot

I. Í uppskotinum ganga út orðini »við broytingum landsstýrisins«

II. Í skjalinum til uppskotið, uppskot til »anordning om ikrafttræden på Færøerne af lov om udnævnelse af biskopper og om stiftsbåndsløsning »verða gjørdar hesar broytingar:

1) Í § 1 verða orðini »fra et universitet i Danmark« strikað.

2) § 9, stk. 1, verður orðað soleiðis:

»Anordningen finder anvendelse på bispevalg, hvortil kirkeministeren indkalder kandidatanmeldelser den 1. januar 1999 eller senere.«

Viðmerkingar:
Viðv. I) Nevndin heldur, at tilmæli heimastýrisins til ríkismyndugleikarnar, soleiðis sum tað verður samtykt av løgtinginum og staðfest av løgmanni, skal verða samanskrivað í einum skjali, nevniliga í einum samanskrivaðum uppskoti til kgl. fyriskipan um at seta í gildi fyri Føroyar lóg um tilnevning av bispum og biskupsdømisskifti, har uppskot kirkjumálaráðsins, broytingaruppskot landsstýrisins og uppskot nevndarinnar verða samanskrivað í eitt samlað uppskot.

Viðv. II) 1) Meirilutin metir, at orðingin av § 1 eigur at vera víðari. Sum nú er, útilokar orðingin, at aðrir kvalifiseraðir persónar enn prestar við útbúgving frá donskum universiteti kunnu setast í bispastarv.

Burturúrløgd. Víst verður til lógtíðindi, folketingstidende 1984-85 sp. B 135, folketingstidende 1987-88 sp. A 3463 og B 603 og folketingstidende 1991-92 sp. A 1991 og B 855.

Skjal 4 Viðmerkingar hjá stiftsstjórn, kirkjustjórn, prestafelagnum og felagnum av kirkjuráðslimum.

a. Skriv frá Føroya Stiftsstjórn 1. mars 1996 til landsstýrið við ummæli til uppskotini frá kirkjumálaráðnum

Vísst verður til bls. 302 (løgtingsmál nr. 11).

b. Skriv frá Føroya Stiftsstjórn 12. august 1996 til landsstýrið við ummæli til uppskotini frá kirkjumálaráðnum

Vísst verður til bls. 307 (løgtingsmál nr. 11).

c. Skriv frá Føroya Kirkjustjórn 5. mars 1996 til landsstýrið við ummæli til uppskotini frá kirkjumálaráðnum. Vísst verður til bls. 307 (løgtingsmál nr. 11).

d. Skriv frá Føroya Kirkjustjórn 12. august 1996 til landsstýrið við ummæli til uppskotini frá kirkjumálaráðnum.

Vísst verður til bls. 308 (løgtingsmál nr. 11).

e. Skriv frá prestafelagnum 14. august 1996 til landsstýrið við ummæli til uppskotini frá kirkjumálaráðnum við tilhoyrandi skjali dagfest 11. mars 1996.

Vísst verður til bls. 308 (løgtingsmál nr. 11).

f. Skriv frá felagnum fyri kirkjuráðslimir dagfest 28. februar 1996 til landsstýrið við ummæli til uppskotini frá kirkjumálaráðnum.
Vísst verður til bls. 311 (løgtingsmál nr. 11).

g. Skriv frá felagnum fyri kirkjuráðslimir dagfest 4. mars 1996 til landsstýrið við ummæli til uppskotini frá kirkjumálaráðnum.

Vísst verður til bls. 312 (løgtingsmál nr. 11).

h. Skriv frá felagnum fyri kirkjuráðslimir dagfest 7. juni 1996 til landsstýrið við ískoyti til skrivið 4. februar 1996 til landsstýrið við tilhoyrandi skrivi frá kirkjuráðnum í Kaldbak til felagið fyri kirkjuráðslimir dagfest 5. mai 1996

Vísst verður til bls. 314 (løgtingsmál nr. 11).

1. Skriv frá Toll- og Skattstovu Føroya dagfest 12. november 1996 við viðmerkingum til anordning om ikrafttreden på Færøerne af lov om folkekirkens økonomi.

Tórshavn 23. mars 1996

Føroya Landsstýrið

Att.: Sámal Petur í Grund, landsstýrismaður

Viðvíkjandi framløguni av nýggju lógarverkinum fyri Føroysku Fólkakirkjuna.

Okkum í nýggja Felagnum fyri kirkjuráðslimir er nýggjasta útkasti til broytingar í lógir fyri Fólkakirkjuna fyri fáum døgum komin í hendi. Frá landsstýrisskrivstovuni hava vit fingið upplýst, at hesar lógir skulu leggjast fyri løgtingið áðrenn 21. mars 1996, sum er seinasta freist fyri framløgu til vártingseluna. Um hendan freist verður yvirhildin, skal Landsstýrið hava møguligar viðmerkingar til lógirnar longu nú í komandi viku, mikudagin 6. mars. Vit, ið mynda felagið, halda hesar lógir vera sera umfatandi at fara ígjøgnum og meta okkum ikki at vera førar fyri at koma við teimum viðmerkingum og broytingaruppskotum, sum vit. aftaná skjóta gjøgnumlesan, mugu fáa høvi at koma við.

Um Felagið fyri Kirkjuráðslimir er at siga, at felagið varð sett á stovn 23. september 1995 og hevur síðan fingið sera góða undirtøku millum kirkjuráðslimir um alt landið. Upplýsast kann, at av teimum umleið 400 kirkjuráðslimunum í landinum eru longu nú útvið 300 limir í felagnum. Hetta er at frøast um og sigur okkum, at tørvurin fyri felagnum hevur verið stórur. Tað er soleiðis, at felagið skal hava sín fyrsta ársaðalfund 16. mars 1996.
Á ársaðalfundinum verður sjálvandi kunnað um fyristandandi broytingar í kirkjulógunum, sum hevur stóran áhuga millum limir okkara.

Tá tíðin fyri, at Landsstýrið skal hava broytingaruppskotini í hendi er sera knøpp, fara vit í fyrsta lagi at beita á Landsstýrið, um tað er møguleiki fyri at fáa útsett hesa framløgu til ólavsøkutingseluna, so betri møguleiki verður til at koma við viðmerkingum og broytingaruppskotum, sum felagið og limir tess meta vera neyðugar.

Í øðrum lagi, um hendan útsetan ikki letur seg gera, so at geva felagnum møguleika fyri at koma við viðmerkingum og broytingaruppskotum aftaná 16. mars, tá ársaðalfundurin er gjørdur kunnugur við hesar nýggju lógir, sum í mongum førum eru bæði nýskapandi og kollveltandi samanborið við verandi lógir.

Tá Felagið fyri kirkjuráðslimir longu nú umboðar stóran part av prestum og teimum fólkum, sum eru tilknýtt til fólkakirkjuna, so vóna vit, at hendan áheitan verður gingin okkum á møti.

Heilsan vegna Felagið fyri kitkjuráðslimir
Niklas Foldbo, formaður. Peter Jacobsen, næstformaður

Viðmerkingar til "Anmodning om ikrafttræden på Færøerne af lov om folkekirkens økonomi"

Toll- og Skattstovan hevur skilt tað soleiðis, at tann partur sum hon skal umsita er kapitul 4 í uppskotinum, og verður mett, at stórvegis trupulleikar ikki eru av hesum, hvørki umsitingarligar ella fíggjarligar.

Tó eru fylgjandi viðmerkingar:
1) Grein 18, stk. 1:
   Toll- og Skattstovan tekur sum givið, at teir persónar (høvuðsregla) sum skulu gjalda kirkjuskatt, eru

teir persónar sum í Landsfólkayvirlitinum eru skrásettir sum limir í fólkakirkjuni, soleiðis at skilja, at Toll- og Skattstovan ikki skal stovna skrá yvir hesar persónar, men beinleiðis kann brúka upplýsingarnar í Landsfólkayvirlitinum.

Ikki er upplýst hvussu kirkjuskatturin skal áfíknast hjá einum persóni, sum tekur seg úr fólkakirkjuni mitt í árinum, og heldur ikki hvussu skal áfíknast tá ið persónur, sum ikki er limur í fólkakirkjuni, velur mitt í árinum at gjalda hóast hetta.
Av umsitingarligum orsøkum hevur Toll- og Skattstovan higartil umsitið hetta á tann hátt, at støðan tann 31. desember í inntøkuárinum er galdandi fyri alt árið. T.d. um persónur tekur seg úr fólkakirkjuni tann 23. desember, so kemur hann als ikki at gjalda kirkjuskatt hetta árið.

2) Í grein 18. stk. 2 stendur m.a. "... fastsetter Toll- og Skattstovan den kirkelige ligningsprocent."
Toll- og Skattstovan metir tað ikki vera rætt at hon skal áseta líkningarprosentið, men eigur hetta at vera uppgáva Landsstýrisins.

3) Grein 18, stk. 3:
Toll- og Skattstovan tekur sum givið at fráboðan um at persónur vil gjalda, hóast hann ikki er limur í fólkakirkjuni, skal fráboðast Toll- og Skattstovuni frá t.d. Føroya Stiftsstjórn.

4) Grein 18, stk. 4:
Ikki er heilt greitt hvat meinast við.

4) Grein 18, stk. 5:
Toll- og Skattstovan tekur sum givið at avgerð um frítøku ikki skal takast av Toll- og Skattstovuni, men skal fráboðast Toll- og Skattstovuni frá t.d. Føroya Stiftsstjórn.

5) Grein 19, stk. 1:
Toll- og Skattstovan kann rokna út og beinta inn kirkjuskattin, men avroknin til kirkjuráðini má gerast av Føroya Gjaldstovu, sum hevur allar almennar inn- og útgjaldingar um hendi.
Sí niðanfyri viðvíkjandi avrokning!

Avrokning:
Sum er, ber ikki til at avroknan beinleiðis til kirkjuráðini.
1) "Lægsta býtiseind" viðvíkjandi skatti er í løtuni kommunan. Hvørki Toll- og Skattstovan ella Føroya Gjaldstova hevur upplýsing um hvørt kirkjuráð ein persónur hoyrir til. Eitt rættiligt stórt umsitingarligt - og edv-arbeiði skal gerast um tann goldni kirkjuskatturin skal býtast til tað kirkjuráð sum viðkomandi persónur hoyrir til.

2) Kirkjuskatturin verður heintaður inn sum fyribilsskattur í inntøkuárinum. Hesin kirkjuskatturin kann býtast til (í løtuni) kommunurnar, sum eitt a"conto gjald í inntøkuárinum.
Tá ið sjálvuppgávan kemur inn skal ein endalig regulering gerast. Ein møgulig seinni broyting til sjálvuppgávuna viðførir eisini at regulering skal fara fram.

3) Kirkjuskatturin fer ídag til ta kommunu sum hevur rætt til kommunuskattin, men **kirkjuprosentið og kommunuprosentið** eru tey prosentini sum eru í tí kommunu, sum viðkomandi persónur hevur bústað tann 31. desember árið fyri.
Hetta merkir, at ein kommuna sum ikki hevur álíknað kirkjuskatt, knapliga kann fáa kirkjuskatt avroknaðan av tí at persónur flytur í kommunua úr eini kommunu sum hevur kirkjuskatt.
(Hesar reglur eru tó ikki altíð galdandi eftir tí nýggja uppskotinum, har kirkjuskatturin ikki verður ásett av kommununi).

4) Sum nevnt er "lægsta býtiseind" í løtuni kommunan, men ber tó til at gera eina lægri eind til kirkjuskattin. Eindin skuldi tá vera bygdin, sum eisini er "lægsta eind" í Landsfólkayvirlitinum.
Trupulleikin er tó, at samsvar ikki altíð er millum bygd og kirkjuráð. Tað vil siga at vit loysa ongan trupulleika við at gera bygdina til lægsta eind.

Fyri at gera skipanina so einfalda og bíliga sum gjørligt setur Toll- og Skattstovan fram fylgjandi uppskot:

a) Støðan viðvíkjandi limaskapi í fólkakirkjuni tann 31. desember er galdandi alt hetta árið.

b) Upplýsing um limaskap í fólkakirkjuni verður heintað frá Landsfólkayvirlitinum.
Fráboðan um fritøku og fráboðan um at persónur vil gjalda hóast hann ikki er limur í fólkakirkjuni skal koma frá stovni uttanfyri Toll- og Skattstovuna, sí grein 18, stk. 5 í lógaruppskotinum.

c) Kirkjuskattaprosentið verður fráboðað Toll- og Skattstovuni av Føroya Landsstýri.

d) Toll og Skattstovan heintar kirkjuskattin eftir reglunum í pkt. a, b og c.

e) Avrokning:

1) Galdandi reglur eru nógv tær lættastu at umsita:
Í dag er tað soleiðis, at kirkjuráðið skal gera fíggjaretlan, sum skal góðkennast av viðkomandi kommunu og av Føroya Stiftsstjórn (fyrr skulu ætlanin góðkennast av Ríkisumboðnum).
Kommunan kann tá álíkna kirkjuskatt, men er hetta ikki neyðugt. Tann upphæddin, sum er góðkend av kommununi og stiftsstjórnuni, verður av kommununi flutt til kirkjuráðið uttan nun til hvussu nógv er goldið í kirkjuskatti. T.v.s. at trupulleikin viðvíkjandi býti og avrokning av kirkjuskatti ídag ikki er til.
Eftir tí nýggja uppskotinum verður býtið og avrokning ein sera stórur trupulleiki.
Toll- og Skattstovan vil tí mæta tit at gladandi reglur verða nýttar framvegis eisini, tó soleiðis at Føroya Gjaldstova fær heimild at rinda 1/12 part av tí góðkendu upphæddini til viðkomandi kirkjuráð hvønn mánað.

2) Um ikki ber til at nýta galdandi reglur framvegis vil Toll- og Skattstovan mæla til at ein arbeiðsbólkur við umboðum frá Føroya Gjaldstovu og Toll- og Skattstovuni verður settur til at loysa trupulleikan.

Nýgerð og kostnaður av hesum:

1) Grundað á upplýsingunum í Landsfólkayvirlitinum skal Toll- og Skattstovan gera eina skipan til skráseting av, at persónur ikki skal gjalda, hóast hann er limur í fólkakirkjuni samanbert upplýsingunum í Landsfólkayvirlitinum, og at persónur skal gjalda hóast hann ikki er limur í fókakirkjuni.
Talan er um eina eingangs-útreiðslu til útvikling, men enn er ikki gjørligt at meta um kostnaðin.
Rakstrarútreiðslur av hesum (dagligt viðlíkahald) verða mettar at vera minimalar.

2) Toll- og Skattstovan skal gera skrá yvir tal av persónum og inngoldnan kirkjuskatt pr. kirkjuráð.
Upplýsingar frá hesari skráseting skulu síðan flytast til Føroya Gjaldstovu til útgjaldingar.
Talan er um eina eingangs-útreiðslu til nýútvikling, men enn er ikki gjørligt at meta um kostnaðin.
Rakstrarútreiðslur av hesum (dagligt viðlíkahald) verða mettar at vera minimalar.

3) Útreiðslur til daglig umsiting annars verða mettar at veta minimalar.

4) Toll- og Skattstovan kann ikki taka støðu til meir-útreiðslur á Føroya Gjaldstovu.

Kurt Madsen, deildarstjóri

1. viðgerð 7. oktober 1997. Málið varð heint í mentanarnevndina, sum tann 19. december 1997 legði fram soljóðandi

Álit

Málið er lagt fram av landsstýrinum tann 30. september 1997 og eftir 1. viðgerð tann 7. oktober 1997 heint í mentanarnevndina.

Víst verður til almennu viðmerkingarnar í løgtingsmáli nr. 117/1997: Uppskot til ríkislógartilmæli um at seta í gildi fyri Føroyar lóg um setan í størv innan fólkakirkjuna v.m.

Um kirkjuskatt er at siga, at galdandi ásetingarnar eru at finna í lóg nr. 109 frá 29. mars 1924 um stjórn kirkjunnar v.m., sum er broytt við lóg nr. 192 frá 11. mai 1935. Lógin heimilar, at kravdur verður lokalur kirkjuskattur og/ella landskirkjuskattur, tó soleiðis at landskirkjuskattur einans kann verða junkravdur, um kirkjugrotmurin ikki er førur fyri at gera sínar skyldur sambr. § 11, stk. 3, í lógini. Umleið 60% av kirkjusóknunum hava í dag kirkjuskatt, og 89% av fimunum rinda kirkjuskatt. Heimildin at krevja landskirkjuskatt hevur onguntíð verið nýtt, men hevur løgtingið í staðin á hvørjum ári á fíggjarlógini latið eina ávísa upphædd til Føroya Kirkjugrunn.

§ 8 í omanfyri nevndu lóg sigur, at:

> *"Naar Kirkens Indtægter ikke er tilstrækkelige til Dækning af dens Udgifter til de i § 3 omhandlede Formaal eller til andre Kirken vedrørende Formaal, som ikke ifølge § 11 skal udredes af Færøernes Kirkefond, tilvejebringes det manglende ved Ligning paa Menighedsraadskredsens til Folkekirken hørende Beboere."*

§ 11, stk. 3, í sama lógini sigur, at:

> *"For saa vidt Kirkefonden ikke er i Stand til at opfylde sit Formaal, kan Lagtinget efter de for Ligning paa Kommunerne Af Amtsrepartitionsfondsskatten til enhver Tid gældende Regler udskrive de forudne Bidrag fra Sognene, der af de kommunale Styrelser paalignes Menighedernes Medlemmer efter de i § 9 omhandlede Regler."*

Viðlagt er yvirlit yvir kirkjuskattaprosentið 1997.

Kirkjuráðini skulu sambært 1924-lógini senda inn fíggjaretlan til kirkjustjórnina til góðkenningar, men sambært stiftsstjórnini minnist eingin, at nakað slíkt er farið fram fyrr. Nú hevur stiftsstjórnin skrivað so fyri, at tað seinastu árini hava verið rættiliga mong kirkjuráð, ið hava sent kirkjustjórnini fíggjaretlan til góðkenningar, so sum lógin ásetir. 1924-lógin fyriskipar, at fíggjaretlan kirkjunnar í seinasta lagi 30. september skal sendast kirkjustjórnini, sum staðfestir fíggjaretlanina. Men løgtingslóg nr. 86 frá 1. september 1983 um landsskatt og kommunuskatt sigur í § 47, stk. 1, næstseinasta punktum, at: "Bygdarráðið ásetir líkningarprosentið fyri kommunu- og kirkjuskatt í seinnu helvt av september mánaði, sum galdandi fyri álnanakkaárið eftir." Stiftsstjórnin viðmerkir, at tað er í roynd og veru ikki gjørligt hjá kirkjustjórnini sakligа at viðgera fíggjaretlanirnar, tá ið kommunurnar eftir skattalógini longu hava ásett kirkjuskattaprosentið, samstundis sum fíggjaretlanirnar verða sendar kirkjustjórnini. Í uppskotinum til lóg um fíggjarviðurskifti fólkakirkjunnar, sum lagt er fyri løgtingið, er tað latið upp í hendurnar á landsstýrismanninum í kirkjumálum at áseta nærri freistir fyri, nær fíggjaretlanir v.m. skulu latast inn, og freistirnar skulu tí ásetast í kunngerð. Tað verður tí lættari at fáa freistirnar at samsvara við freistirnar í øðrum lógum, sigur stiftsstjórnin.

Sera vánaligu fíggjarvánirnar hjá nógvum kommunum í Føroyum hava eitt nú havt við sær, at fleiri kommunur í longri tíð hava afturhildið kirkjuskattin til egið brúk. Kommunala eftirlitið í landsstýrinum hevur ikki gjørt nakað við hetta lógbrot. Stiftsstjórnin upplýsir eisini, at tað nógvar staðir hevur verið rættiliga tilvildarligt, hvussu kirkjuskatturin er ásettur. Í fleiri støðum hevur tað verið vanligt, at kirkjuráð og kommunala eru vorðin samd um eitt ávíst kirkjuskattaprosent, sum so hevur verið hitt sama í fleiri ár. Hetta er ikki samsvarandi 1924-lógini.

§ 43 í grundlógini sigur, at: "Ingen skat kan pålægges, forandres eller ophæves uden ved lov; ejhefler kan noget mandskab udskrives eller noget statslån optages uden ifølge lov." Samsvarandi regla er eisini í stýrisskipanarlógini § 41.

Mett verður ikki, at ásetingin í § 43 fevnir um kommunalar skattir og avgjøld.

Vanliga verður mett, at § 43 við orðunum "Ingen.....uden ved lov" er ein forðing fyri, at ein lóg heimilar fyrisitingini at gera skattafyriskipanir, men samtaert løgfrøðiligari teori verður ávíst, at heimild til at gera skattafyriskipanir, ið eru víðfevndari enn "gennemførelsesanordninger", er oftа komið fyri í veruleikanum. Sum reglurnar í galdandi lóg eru orðaðar, katn grundgeving finnast fyri, at teir skattir, ið kunnu álíknast, eru at meta sum nær líknandi kommunalum skattum.

Sum reglurnar eru orðaðar í fyriliggjandi uppskoti, er ikki sami møguleiki at finna grundgeving fyri, at tann skattur, ið kann álíknast, kann metast sum líknandi komtnunalum skatti.

Fyrispurningur hevur verðið sendur kirkjumálaráðnum, dagfest 26. november 1997, um at gera eina meting av spurninginum um fyriliggjandi lógaruppskot, sum orðað av kirkjumálaráðnum, eru í samsvar við § 43 í grundlógini.

Tá álitið varð skrivað, varð svar enn ikki komið frá kirkjumálaráðnum.

Meirlutin tekur undir við, at plass eigur at verða fyri útreiðslum til prestaembætini samsvarandi teimum, sum danska bústaðarrundskrivið fevnir um.

Nevndin er samd um, at møgulig rættindi hjá triðjamanni skulu verða vird í sambandi við fgildisetan av hesi lóg, og at ætlanin ikki er at broyta nakað hesum viðvíkjandi.

Meirlutin í mentanarnevndini (Bjarni Djurholm, Lisbeth Petersen, Maria Hansen, og Lasse Klein) mælir løgtingitnum til at samtykkja uppskotið við ávísum niðanfyri tilmæltum broytingum.

Lasse Klein skal tó viðmerkja, at hann hevur ikki verið partur av viðgerðini, orsakað av at hann nústani er vorðin limur í mentanarnevndini, og at møgtdigar viðmerkingar verða at fara fram, tá málið kemur til 2. viðgerð.

Ein **minniluti í mentanarnevndini** (Signar á Brúnni) tekur ikki undir við uppskotinum, vísandi til viðmerkingar sínar í løgtingsmáli nr. 117/1997.

Ein **annar minniluti í mentanarnevndini** (Jógvan Adolf Johannessen) tekur støðu í tingsalinum og vísir annars til uppskot Javnaðarfloksins um setan av stjórnmálanevnd.

Ein **triði minniluti í mentanarnevndini** (Jenis av Rana) tekur støðu til uppskotið í lingsalinum

Meirlutin í nevndini (Bjarni Djurholm, Lisbeth Petersen, Maria Hansen og Lasse Klein) setir fram soljóðandi

B r o y t i n g a r u p p s k o t

I. Í uppskotinum ganga út orðini "við broytingum landsstýrisins"

II. Í skjalinum til uppskotið, uppskot til "anordning om ikrafttræden på Færøerne af lov om folkekirkens økonomi" verða gjørdar hesar broytingar:

1) § 2, stk. 1, nr. 8, verður orðað soleiðis: "8) Honorar og andre udgifter til medarbejdere ved kirken, samt løn til de jfr. § 16, stk. 2 i anordning om ikrafttræden på Færøerne af lov om ansættelse i stillinger i folkekirken m.v., ansatte personer, efter Landsstyremanden for Kirkelige Anliggenders nærmere bestemmelse."

2) § 2, stk. 2, verður orðað soleiðis: "Udgifter vedrørende ikke selvejende kirker afholdes af den, der ejer kirken. Ved ikke selvejende kirker kan der af kirkekassen dog afholdes udgifter til:

1) Anskaffelse af orgel efter harmonium
2) Installation af elektrisk belysning
3) Anskaffelse af tysekroner og andre mere bekostelige belysningselementer
4) Anskaffelse af børneanlæg
5) Opvarmning af kirken
6) (udgår)."

3) § 5, stk. 2, verður orðað soleiðis: "I budgetsamråd forhandles de enkelte bevilfingsforslag og deres prioritering. Budgetsamråd har ikke besluttende myndighed."

4) § 5, stk. 3, verður orðað soleiðis: "Menighedsrådene har pligt til at lade sig repræsentere under budgetsamråd."

5) § 9, stk. 1, verður orðað soleiðis: "Menighedsrådet aflægger årligt regnskab for kirkekassen. Landsstyremanden for Kirkelige Anliggender fastsætter nærmere regler om regnskabernes aflæggelse, om benyttelse af regnskabskyndig bistand i forbindelse med regnskabernes tilrettelæggelse og aflæggelse og ved kasseeftersyn, om revision og om provstiudvalgets godkendelse af regnskaberne."

6) § 15, stk. 1, verður orðað soleiðis: "Hvert år inden 1. marts indsender stiftsøvrighederne hver for sit stifts vedkommende et budget over fællesfondens indtægter og udgifter i det følgende regnskabsår til kirkeministeren."

7) § 18, stk. 2, verður orðað soleiðis: "Påligningen sker under ét for Færøernes Stift. Den kirkelige ligningsprocent, som ikke kan overstige 0,3%, fastsættes af Landsstyremanden for Kirkelige Anliggender efter høring af stiftsøvrigheden om fastsættelse af ligningsbeløbet."

8) § 18, stk. 3, verður orðað soleiðis: "En person, som ikke er medlem af folkekirken, kan meddele Toll- og Skattastovu Føroya, at vedkommende ønsker at betale kirkeskat."

9) § 19, stk. 1, verður orðað soleiðis: "Ligningsbeløb udbetales til vedkommende menighedsråd af Føroya Gjaldstova. Dog udbetales beløb til imødegåelse af uforudsete udgifter, jf. § 6, stk. 1, kun til vedkommende menighedsråd efter anmodning fra stiftsøvrigheden. Et eventuelt ved regnskabsårets slutning tilbagestående beløb anvendes af Toll- og Skattstovu Føroya til nedbringelse af det følgende års ligning."

10) § 19, stk. 2, verður orðað soleiðis: "Stiftsøvrigheden har pligt til at oplyse Føroya Gjaldstovu om, hvilke menighedsråd, der skal afregnes til."

11) § 19 b, stk. 1, verður orðað soleiðis: "Færøernes Kirkefond afholder halvdelen af udgifterne vedrørende befordringsgodtgørelse til præsterne på Færøerne."

12) Í § 19 c verður innsett sum stk. 3: "Hvert år inden en af Landsstyremanden for Kirkelige Anliggender fastsat frist indsender stiftsøvrigheden over Færøernes Stift forslag til budget over Færøernes Kirkefonds indtægter og udgifter i det følgende regnskabsår til Landsstyret."

13) § 21, stk. 2, verður orðað soleiðis: "Stiftsøvrigheden bestyrer kirkernes øvrige kapitaler efter bestemmelser, fastsat af Landsstyremanden for Kirkelige Anliggender."

14) § 23, stk. 1 verður orðað soleiðis: "Stiftsøvrigheden bestyrer præsteembedernes faste ejendomme samt præsteembedernes øvrige kapitaler efter bestemmelser, fastsat af kirkeministeren."

15) § 24, stk. 2, verður orðað soleiðis: "Provstiudvalget vælger af sin midte en formand og en næstformand. Valget sker ved skriftlig afstemning på udvalgets konstituerende møde, som provsten indkalder til. Valget gælder for udvalgets valgperiode. Medlemmerne af udvalget er pligtige at modtage valg som formand og næstformand. Provsten virker som udvalgets forretningsførende medlem og drager omsorg for udførelsen af udvalgets beslutninger."

16) § 24, stk. 3, verður orðað soleiðis: "Provstiudvalget bestemmer selv i hvilket omfang dets møder skal være offentlige og fastsætter selv sin forretningsorden. Er der uenighed i provstiudvalget om forretningsgangen, kan spørgsmål herom forelægges stiftsøvrigheden til afgørelse."

17) § 24, stk. 4, verður orðað soleiðis: "De i lov om menighedsråd § 46, stk. 1, nævnte regler om annullation og suspension af beslutninger finder tilsvarende anvendelse over for et provstiudvalgs beslutninger, der strider mod lovgivningen. Endvidere finder de i lov om menighedsråd § 46, stk. 2-5, og § 48 nævnte regler om påleggelse af tvangsbøder i forbindelse med ulovlige undladelser, anlæggelse af erstatningssager ved domstolene, frafald af erstatningsanlæg mod betaling af erstatningsretlig bod samt nedsættelse eller helt bortfald af en erstatning tilsvarende anvendelse over for medlemmer af provstiudvalg, der er ansvarlige for en undladelse eller for, at en kirkekasse, fællesfonden eller Kirkefonden er påført et tab."

18) § 27, stk. 1, verður orðað soleiðis: "Anordningen træder i kraft den 1. januar 1999.""

Viðmerkingar

Viðv. I) Nevndin heldur, at tilmæli heimastýrisins til ríkismyndugleikarnir, soleiðis sum tað verður samtykt av løgtinginum og staðfest av løgmanni, skal verða samanskrivað í einum skjali, nevniliga í einum samanskrivaðum uppskoti til kgl. fyriskipan um at seta í gildi fyri Føroyar lóg um fíggjaviðurskifti fólkakirkjunnar, har uppskot kirkjumálaráðsins, broytingaruppskot landsstýrisins og uppskot nevndarinnar verða samanskrivað í eitt samlað uppskot. Nevndin hevur tó ikki endurgivið broytingaruppskot landstýrisins lítra d, e, f, g, h, i, l, n, o, partar av p, x og y, ið viðvíkja landsstýrisins uppskoti um lokalan kirkjuskatt. Mælt verður til, at Føroyar verða eitt fíkningardømi soleiðis, at ásetast skal ein felags kirkjuskattur. Grundgevingin fyri hesi broyting er tann, at tað stendur so illa til hjá teimum smáu kirkjunum.

Viðv. II) 1) Hetta er uppskot landsstýrisins, sum verður ført inn í uppskotið til kgl. fyriskipan. Harumframt verður heimild givin at rinda lønir til skrivstovufólk og organist, sum verða sett í starv við kirkjum, har talið av skrásettum limum er yvir 2.000.

Viðv. II) 2). Málslig rætting.

Viðv. II) 3-7) Hetta eru uppskot landsstýrisins, sum verða førd inn í uppskotið til kgl. fyriskipan.

Viðv. II) 7) Meirlutin í mentanarnevndini heldur, at tað eigur at verða landsstýrismaðurin, ið fær tað endaligo heimildina at áseta kirkjuskattaprosentið. Meirlutin heldur, at ein landsstýrismaður skal kunna forða fyri, at kirkjuskattaprosentið hækkar ella fer upp um eitt vist. Undir nevndarviðgerðini er komið fram, at skulu føroysku fólkakirkjurnar røkjast optimalt er neyðugt, at kirkjuskattur verður álíknaður fyri alt landið. Sambært teimum upplýsingum, sum nevndin hevur fingið hendur á, fer eitt felags kirkjuskattaprosent, sum er 0,37, ríkiliga at nøkta tørvin hjá føroysku kirkjunum. Meirlutin heldur, at við einum nakað lægri felags kirkjuskattaprosenti verður sama endamál rokkið bert yvir eitt longri tíðarbil. Meirlutin mælir tí til, at kirkjuskattaprosentið ikki eigur at fara upp um 0,3%. Í regluni liggur bert ein skylda hjá landsstýrismanninum í kirkjumálum at senda málið til ummælis hjá stiftsstjórnini um ásetan av líkningaruppheddini. Men tað liggur í regluni eingin skylda til at fylgja teim tilmælum, sum ummæli frá stiftsstjórnini gevur.

Viðmerkjast kann í hesum sambandi, at ásetingin í stk. 4, 2. pkt., ikki er at finna í tí donsku lógini, men er sett inn fyri at tryggja, at fólk, sum búgva í eini sókn, har útreiðslurnar hjá kirkjukassanum fult út javnviga við sjálvbodnar veitingar, sambært § 3, stk. 1, í uppskotinum, ikki verða álíknaði kirkjuskatt.

Viðv. II) 8) Hetta er uppskot landsstýrisins, sum verður ført inn í uppskotið til kgl. fyriskipan.

Viðv. II) 9) Samsvarandi uppskoti landstýrisins verður innført, at líkningaruppheddin verður útgoldin av Føroya Gjaldsstovu. Restin av broytingaruppskoti landsstýrisins fellur burtur, sí viðmerkingarnar að I).

Viðv. II) 10) Hetta er uppskot landsstýrisins, sum verður ført inn í uppskotið til kgl. fyriskipan. Tó er ásetingin flutt frá stk. 3 til stk. 2, og kommunan er broytt til stiftsstjórnin.
Viðv. II) 11-12) Hetta eru uppskot landsstýrisins, sum verða førd inn í uppskotið til kgl. fyriskipan.

Viðv. II) 13)-14) Hetta eru uppskot landsstýrisins, sum verða førd inn í uppskotið til kgl. fyriskipan. Tó eru tekniskar broytingar gjørdar.

Viðv. II) 15) Málslig rætting.

Viðv. II) 16-18) Hetta eru uppskot landsstýrisins, sum verða førd inn í uppskotið til kgl. fyriskipan.

Kommunuskattaprocent 1997:

				1996:			Munur
	Komm.sk.%	Ki.sk.%	Barnafr.	Komm.sk.%	Ki.sk.%	Barnafr.	
Komm.sk.%							
Fuglafjarðar	16.00		2,000	16.00		2,000	0.00
Svínoyar	16,00		4,200	16,00		4,200	0.00
Viðareiðis	22.00	0,30	1,800	22.00	0,30	1,500	0.00
Hvannasunds	20.00	0.20	2,500	20.00	0.20	2,000	0.00
Klaksvíkar	20.00	0.23	2,500	20.00	0.25	2,500	0.00
Kunoyar	16,00		2,500	16.00		2,500	0.00
Mikladals	16.00		3,000	16.00		2,000	0.00
Húsa	19.00		4,000	19,00		2,500	0.00
Oyndarfjarðar	23,00		2,000	23,00		1,500	0.00
Eldvíkar	23.00		1,500	23.00		1,500	0.00
Fuglafjarðar	19.12	0.25	2,500	19.12	0.42	2,500	0.00
Leirvíkar	22.00	0.45	2,500	22.00	0.45	2,500	0.00
Gøtu	18.50	1,20	3,600	19,00	1,20	2,600	(0,50)
Nes	19,90	0,92	2,200	19,90	0,95	2,200	0,00
Runavíkar	20.00	0,40	1,500	20,00	0,46	1,500	0,00
Sjóar	17.00		3,000	17.00		2,500	0,00
Skála	21,35	0,15	2,500	21,35	0,15	2,500	0,00
Eiðis	18,50	0,27	2,000	18,50	0,27	2,000	0,00
Sunda	17.74	0,23	3,500	17.74	0,26	2,500	0,00
Funningis	16.00		3,000	16.00		3,000	0,00
Gjáar	16.00		5,000	16.00		5,000	0,00
Haldórsvíkar	18.20	0.30	2,500	18.20	0.30	2,500	0,00
Saksunar	19.00		2,000	19.00		2,000	0,00
Hvalvíkar	19.00		3,000	19,00		3,000	0,00
Hósvíkar	17.50		1,500	17.50		1,500	0,00
Kollafjarðar	18.50	0.25	1,800	18.50	0.25	1,800	0.00
Kvívíkar	18.50	0.50	2,000	18.50	0.50	2,000	0,00
Vestmanna	23.00	0.20	2,000	23.00	0.20	2,000	0,00
Argja	19.00	0.25	3,000	19.00	0.25	3,000	0,00
Kirkjubøar	17.00		2,000	17.00		2,000	0,00
Hests	17.00		1,500	17,00		1,500	0,00
Nólsoyar	18.07		2,000	19.00		2,000	(0,93)
Sandavágs	18.80	0.20	2,500	19.30	0.20	2,500	(0.50)
Miðvágs	23.00	0.20	1,800	23.00	0.20	1,800	0.00
Sørvágs	21.00	0.25	2,500	21,00	0,05	2,500	0,00
Bøggjar	17.00		1,000	17.00		1,000	0.00
Mykines	16.00		1,500	16.00		1,500	0.00
Sands	23,00		4,000	23,00		4,000	0.00
Skopunar	23.00	0.18	1,800	23.00	0.15	1,800	0.00
Skálavíkar	18.00		3,000	18.00		3,000	0,00
Húsavíkar	20.50		1,500	20.50		1,500	0,00
Skúvoyar	17.00		2,000	16,00		2,000	1,00
Hvalbiar	19.00	0,20	3,000	19,00	0,25	1,500	0,00
Tvøroyrar	23.00	0,25	2,500	23,00	0,25	2,000	0,00
Fámjins	16.00		2,500	16,00		2,000	0,00
Hovs	21.00	0,30	3,000	21.00	0,30	1,500	0,00
Porkeris	23.00	0,25	2,000	23,00		2,000	0,00
Vágs	23.00	0,25	2,000	23,00	0,25	2,000	0,00
Sumbiar	19.00	0,25	3,000	19,00	0,25	3,000	0,00
Tórshavnar	19.00	0,25	3,000	19,00	0,25	3,000	0,00
Hægsta	23,00	1,20	5,000	23,00	1,20	5,000	0,00
Meðal	19,82	0,27	2,598	19,85	0,27	2,490	(0,03)
Lægsta	16.00	0,15	1,000	16,00	0,05	1,000	0,00

2. viðgerð mikudagin 14. januar 1998. Broytingaruppskot I samtykt 16-5-0. Broytingaruppskot II til §§ 2, 5, 9, 15, 18, 19, 21, 23, 24 og 27 samtykt 16-2-3. Uppskotið soleiðis broyt samtykt 17-1-4. At uppskotið soleiðis samtykt kann fara til 3. viðgerð samtykt 17-1-4.

3. viðgerð týsdagin 20. januar 1998. Løgtingsmeminir Bjarni Djurholm, Lisbeth L. Petersen, Maria Hansen og Lasse Klein løgdu fram soljóðandi:

Broytingaruppskot

Í § 18 stk. 5 í uppskotinum ganga út orðini:
"(stk. 5. i den danske lov udgår.)"

Viðmerking
Ein arbeiðsviðmerking er av misgávum komin at standa í lógartekstinum, og verður hon tilmælt strikað.

Broytingaruppskotið til § 18 samtykt 18-8+0. Uppskotið, sum samtykt við 2. viðgerð og broytt við 3. viðgerð, endaliga samtykt 16-6-4.

Ríkislógartilmæli, 28.01.1998
F.L.j.nr. 2000-9/96

18 Broyting í løgtingslóg um stýrisskipan Føroya

Ár 1997, fríggjadagin 30. september, legði Tordur J. Niclasen, løgtingsmaður, vegna Miðflokkin fram soljóðandi:

U p p s k o t
til
løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um stýrisskipan Føroya

§ 1.

Í løgtingslóg nr. 103 frá 26. juli 1994 um stýrisskipan Føroya verður § 6, stk. 2 strikað.

§ 2.

Løgtingslógin fær gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.
Stk. 2. Allur hin danski teksturin í lógini verður strikaður.

Viðmerkingar

Skipanin, viðvíkjandi heimild til at upploysa løgtingið, sum var í gildi, áðrenn vit høgu nýggja stýrisskipanarlóg fyri Føroyar, var upprunaliga smíðað við tí fyri eyga at skapa politiskan stabilitet og at tryggja, at val í ótíð bert kom fyri heilt undantaksvís.

Í slíkum føri var tað neyðugt, at ein **meirluti** á tingi atkvøddi fyri uppskoti um nýval.

Broytingin, sum kom við nýggju stýrisskipanarlógini, førdi við sær, at umframt løgtingið fekk nú ein **einsamallur** maður/kvinna, løgmaður, heimild til at senda tingið til hús.

Longu tá uppskotið um nýggja stýrisskipanarlóg fyri Føroyar var til 1. viðgerð 6. apríl 1994, vóru tað tingmenn, sum vóru ivasamir við ætlaðu broytingini í § 6, har skotið varð upp, at løgmaður nú eisini skuldi fáa heimild til at senda tingið til hús í ótíð.

Eisini undir sjálvari viðgerðini í nevndini var spurningurin reistur, og hvørm vóru í iva.

Tó, tá avtornaðir, samtykti tingið nýggju stýrisskipanarlógina 25. juli 1994 við 29 atkvøðum fyri og ongari ímóti.

Sostatt fekk løgmaður rættin til at skriva út nýval.

Nevndin, ið gjørdi uppskot til "álit um stýrisskipanarviðurskiftir Føroya", sigur í sínum viðmerkingum m.a.:

" Nevndin heldur, at rættur eigur at verða givin løgmanni at skriva út nýval sum eina avleiðing av tankanum aftanfyri valskýtinum í § 1, at teir ríggir stovnarnir, sum hava valdið, skulu ansa eftir, at javnvág er teirra millum. Soleiðis kann løgtingið krevja, at landsstýrið fer frá, og hinvegin má so landstýrið við løgmanni á odda eisini kunna krevja, at nýval verður hildið"

Hóast tankarnir aftanfyri broytingarnar helst hava verið vælmeintir, so er uppskotsstillarin komin eftir, at javnvágin hesum viðvíkjandi er so sum so. Tí í roynd og veru er tað løgmaður, sum hevur "bukturin og báðar endarnar."

Skuldi tað hent, at tingmeirluti varð fyri at sett mísálit á løgmann, so fer tað helst ongantíð at verða gjørt av "vátta" fyri, at løgmaður tá ger móttiltøk og útskrivar nýval.

Ein annar praktiskur trupulleiki í verandi skipan er, at tað tykist ørkymlandi og ikki serliga demokratiskt, at tingið ikki "tordir" at fremja avgerðir orsakað av, at eitt einsamallur persónur, sum ikki er samdur við meirlutan , við hóttan um nýval sosleiðis kann "niðurbinda" eitt løggevandi ting.

Tað kann ikki vera rætt, at "hóttin" um nýval so at siga skal "núlabinda" Føroya løgting.

Fyri at avmarka rættin hjá einum einstøkum persóni at útskrivað nýval, kundi tað verið gjørt, at ein meirluti í landsstýrinum kravdist fyri at útskriva nýval.

Eitt er at ivast í, at hóttanir og óttin fyri nývali í ótíð hevur kostað føroyska skattgjaldarannum nógv. Tað, at ósemjir stinga seg upp í einari samgongu ella í einum landsstýri, eigur ikki at hava tær avleiðingar, at nýval verður útskrivað.

Tað, at flokkar í landsstýrissamgongu ikki megna at samstarva, kann sjálvandi hava tær avleiðingar, at landsstýrið kemur í minniluta og leggur frá sær.

Skipanin í Noregi er, at valskeiðið er 4 ár, og ikki ber til at hava val í ótíð. Har hevur tað so eisini borið til at stýrt øll hesi árini - enntá stóran part við minniluta stjórn.

Fyri at varðveita tí sokallaðu javnvágina, verður skotið upp, at hvørki løgmaður ella tingið kunnu útskriva nýval í ótíð.

Uppskotsstillarin er samførdur um, at tá Føroya fólk hevur valt løgting, so er tað fyri tað ásetta tíðarskeiðið, nevniliga 4 ár, og hevur krav uppá, at politikararnir taka avgerðir og finna loysnir.

At halda val í tíð og ótíð er tað sama sum at balda veljaran fyri gjøldar.

Verður uppskotið samtykt, fer tað at gagna samfelagnum, tað fer at betra munandi um fortreytirnar fyri politiskum samstarvi, fer at frátaka einstøkum persóni møguleikan at hóta við nývali, og annars fer tað at forða flokkum at spekulera í møguligum "atkvøðuvinningi" í at fáa val í ótíð.

1. viðgerð 15. december 1997. Uppskotið verður heint í rættarnevndina, sum fríggjadagin 13. februar 1998 legði fram soljóðandi

Álit

Málið er lagt fram av Miðflokkinum tann 30. september 1997 og eftir 1. viðgerð tann 15. december 1997 beint í rættarnevndina.

Rættarnevndin hevur viðgjørt málið.

Spurningurin snýr seg um at avtaka møguleikan at útskriva val bæði av løgtingi og løgmanni, sum er heimilað í verandi stýrisskipanarlóg.

Sagt verður í grundgevingunum til uppskotið, at vit hava ringar royndir av hesi skipan, og at hon elvir til óstøðug viðurskifti í samfelagnum.

Rættarnevndin er komin til tann niðurstøðu, at eingin orsøk er til at fremja eina tílíka broyting so stutt eftir, at nýggja stýrisskipanarlógin er komin í gildi.

Umráðandi er, at løgting og landsstýri fáa stundir at laga seg til nýggju skipanina soleiðis, at ein fast parlamentarisk siðvenja fær umstøður at festa røtur.

Tá henda skipan við heimild at skriva út val í úrtíð hevur reynst væl í flest øllum øðrum demokratiskum londum, so metir rættarnevndin ikki, at stundin enn er komin til at fara undir so grundleggjandi broytingar í okkara stýrisskipanarlóg.

Annars heldur rættarnevndin, at tað hevði verið hóskandi at sett eina nevnd at endurskoða ávís viðurskifti í okkara stýrisskipanarlóg, sum møguliga treingir til ábøtur.

Her kann nevnast møguleikin at útskriva val beint eftir, at val hevur verið, um tað. loganaður skuldi verið ónøgdur við úrslitið.

Eisini kann nevnast møguleikin at hava fótkaatkvøðu, og í størri mun at varðveita minnilutaverjuna, sum varð tikin burtur, hóast tilmæli um hetta í stýrisskipanarálitinum.

Nevndin mælir til, at hóvað verður við at gera nakað við hetta mál til eftir valið.

2. viðgerð týsdagin 17. februar 1998. Uppskotið feldið 5-1-11.

19 Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um Postverk Føroya

Ár 1997, 28. oktober, legði Lasse Klein, løgtingsmaður vegna seg sjálvan og løgtingsmenninar Henrik Old, Tord J. Niclasen, Signar á Bránni, Jákup Olsen, Jógvan A. Johannessen og Ingeborg Vinther fram soljóðandi:

U p p s k o t
til
løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um Postverk Føroya

§ 1.

Í løgtingslóg nr. 17 frá frá 31. mars 1976 um Postverk Føroya, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 86 frá 13. juni 1995, verður fremst í 5. kapitul. avgreiðsla, sett sum nýggj § 10 a:

"**§ 10 a.** Postverk Føroya hevur skyldu til at hava postavgreiðslu á hesum støðum:

Tórshavn, Gásadalur, Hattarvík, Kirkja, Kvívík, Mykines, Oyrabakki, Sandavágur, Skálavík, Skúvoy, Sumba, Toftir, Vestmanna, Fámjin, Gjógv, Hestur, Klaksvík, Leirvík, Nólsoy, Porkeri, Sandur, Skáli, Strendur, Svínoy, Tvøroyri, Viðareiði, Fuglafjørður, Gøta, Hvalba, Kollafjørður, Miðvágur, Norðradalur, Saltangará, Sandvík, Skopun, Stykkið, Sørvágur og Vágur."

§ 2.

Løgtingslógin fær gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

Stk. 2. Allur hin danski teksturin í lógini verður strikaður.

Viðmerkingar

Postverk Føroya hevur boðað frá, at ætlanin er at niðurleggja hesar postavgreiðslur:

Porkeri	Fámjin	Sandvík	Stykkið	Kvívík
Gjógv	Toftir	Viðareiði	Skálavík	

Hetta er eisini orsøkin til, at undirritaðu tingmenn leggja fyri tingið uppskot, sum leggur eina lógásetta skyldu á Postverk Føroya at varðveita og víðka um tænasturnar í mest møguligan mun.

Uppskotsstillararnir, sum hava sæð útrokningargrundarlagið hjá leiðsluni, kunnu undir ongum umstøðum góðtaka, at postverkið tekur hetla stig, og til less at undirstrika tað neyðuga í at varðveita tær smáu eindirnar, leggja uppskotsstillararnir uppskot fram, sum treytar postverkinum framhaldandi rakstur av omanfyri standandi eindum, samstundis sum allar postavgreiðslur í landinum verða skrásettar í sjálvari løgini.

Hesar eindirnar hava eisini sín rætt í samfelagnum, eisini til tær tænastur, sum postverkið gevur, og tað er hetta rætt til tænastur, sum uppskotsstillararnir vilja gera vart við.

Uppskotsstillararnir eru ikki í iva um, at postverkið hevur møguleikar fyri at økja umvæli um tænastustøðið, at menna um uppgávurnar við einum víðkaðum tænastustøði við t.d. útbering av posti og møguligar øktum upplatingartíðum, umframt størri kundatænastu gjøgnum postgirostovnin serliga í bygdum, har eingin peningastovnur er.

Uppskotsstillararnir meta tænasturnar, sum í flestu førum hava verið til í eitt mannsaldur, at vera so týdningarmiklar tænastur, at Postverk Føroya ikki í framtíðini av sínum eintingum eigur at kunna niðurleggja tænastur, uttan at serlig løgtingslógarheimild verður givin fyri hesum.

1. viðgerð 6. november 1997. Uppskotið verð beint í mentanarnevndina, sum tann 19. desember 1997 legði fram soljóðandi:

Álit

Málið er lagt fram av 7 tingmonnum tann 28. oktober 1997 og eftir 1. viðgerð tann 6. november 1997 beint í mentanarnevndina.

Mentanarnevndin hevur viðgjørt málið og hevur undir viðgerðini havt fund við stjórnan á Postverki Føroya. Undir viðgerðini hevur nevndin býtt seg í ein meirluta og ein minniluta.

Meirlutin í mentanarnevndini (Lasse Klein, Jógvan Adolf Johannessen, Signar á Bránni og Jenis av Rana) tekur undir við uppskotinum og mælir løgtingnum til at samtykkja uppskotið hjá teimum 7 tingmonnunum.

Minnilutin í mentanarnevndini (Bjarni Djurholm, Maria Hansen og Lisbeth Petersen) førir fram, at undir viðgerðini er komið undan kavi, at verður tað sett í lóg, hvørji posthús skulu vera opin, fer heilla at gera tað sera torført hjá Postverki Føroya at laga sítt virksemi í samsvari við tær broytingar, ið henda á postøkinum. Minnilutin kann ikki vísa á aðra ordning um karmar av virksemi postverksins enn hana, sum er í galdandi lóg um Postverk Føroya.

Undir viðgerðini er komið fram, at verður uppskotið samtykt, sum tað fyriliggur, fer tað at hava við sær eina meirútreiðslu fyri Postverk Føroya, sum er umanfyri 800.000,- kr. árliga, samanborið við tá rakstrarætlan, sum postverkið hevur sett upp fyri komandi ár.

Skal Postverk Føroya hava tær deildir opnar, sum skotið verður upp, verður møguliga neyðugt hjá løgtinginum at játta tann pening, sum restar í tíl rakstur av Postverki Føroya fyri komandi ár.

Við atliti til týdningin, sum smáu posthúsini hava í nærumhvørvinum, heitir minnilutin á landsstýrið um ikki at skerja virksemið hjá smáu posthúsunum.

Yvirlit frá Postverki Føroyu um sparingar, sum standast av at lata aftur tey 9 posthúsini, er lagt við. Uppseting um sparingarnar, útgreinaðar á hvørt posthúsið, er eisini løgd við sum skjalaldfar.

Samanføka

Posthús	verandi skipan	broytt skipan	sparing
Viðareiði	kr. 241.360,00	kr. 118.500,00	kr. 122.860,00
Gjógv	kr. 177.327,00	kr. 75.000,00	kr. 102.327,00
Toftir	kr. 177.261,00	kr. 103.000,00	kr. 74.261,00
Kvívík	kr. 252.335,00	kr. 128.500,00	kr. 123.835,00
Stykkið	kr. 128.199,00	kr. 109.000,00	kr. 19.199,00
Skálavík	kr. 188.373,00	kr. 126.000,00	kr. 62.373,00
Sandvík	kr. 196.029,00	kr. 79.000,00	kr. 117.029,00
Fámjin	kr. 215.582,00	kr. 119.000,00	kr. 96.582,00
Porkeri	kr. 261.914,00	kr. 175.500,00	kr. 86.414,00
			kr. 804.880,00

2. viðgerð fríggjadagin 16. januar 1998. Signar á Brúnni, Jógvan Adolf Johannessen, Lasse Klein og Jenis av Rana, løgtingsmenn, setta fram soljóðandi:

B r o y t i n g a r u p p s k o t

1) Í § 1 verða orðini "postavgreiðsla" broytt til "postavgreiðsluhús".
2) Í § 1 verða orðini "og Vágur" broytt til "Vágur, Argir og Eiði"

Broytingaruppskot frá Signar á Brúnni, Jógvan Adolf Johannessen, Lasse Klein og Jenis av Rana til § 1 samtykt 16-9-2. § 1 soleiðis broytt samtykt 16-7-4. § 2 samtykt 16-6-5. At uppskotið soleiðis samtykt kann fara til 3. viðgerð samtykt 16-9-2.

3. viðgerð týsdagin 20. januar 1998. Uppskotið, sum samtykt við 2. viðgerð, endaliga samtykt 15-4-4.

Løgtingslóg nr. 13 frá 28.01.1998

20 Uppskot til løgtingslóg um fyrireiking av yvirtøku fólkakirkjunnar

Ár 1997, 28. oktober, legði Signar á Brúnni, løgtingsmaður, vegna Tjóðveldisflokkin fram soljóðandi:

U p p s k o t
til
løgtingslóg um fyrireiking av yvirtøku fólkakirkjunnar v.m.

§ 1. Heimastýrið yvirtekur málsøkið fólkakirkjan sbr. § 3 og lista B í heimastýrislógini frá 1. januar 2000 at rokna.

§ 2. Landsstýrið setir eina nevnd at viðgera fólkakirkjuligu viðurskiftir Føroya.

§ 3. Fólkakirkjunevndin skal hava 5 limir, sum landsstýrið velur.
Stk. 2. Í nevndini skulu sita:
2 prestar
1 kirkjuráðslimur

1 húskaparfrøðingur
1 løgfrøðingur
Stk. 3. Nevndin skipar seg sjálv við formanni og nestformanni.

§ 4. Arbeiðssetningurin hjá fólkakirkju-nevndini er:
1) at skapa neyðugt grundarlagið fyri samráðingunum millum landsstýrið og kirkjumálaráðið um, hvussu yvirtøkan av fólkakirkjuni skal fara fram,
2) at lýsa galdandi fólkakirkjuligu lóggávuna og fíggjarligu viðurskiftini fólkakirkjunnar í dag,
3) í stuttum at lýsa fólkakirkjuligu lóggávuna og fíggjarligu viðurskiftini fólkakirkjunnar í londunum nest okkum,
4) at gera eitt uppskot til løgtingslóg um stýri og rakstur av fólkakirkjuni v.m., sum m.a. inniheldur reglur um
   - hægri fyrisiting og stýring fólkakirkjunnar
   - kirkjur og kirkjugarðar
   - starvsfólkaviðurskifti fólkakirkjunnar
   - kirkjuligar gerðir
   - halgidagsfrið
   - onnur kirkjusamfelløg.

Stk. 2. Nevndin hevur heimild at viðgera allar fólkakirkjuligar spurningar, sum nevndin heldur hava týdning.

§ 5. Nevndin skal sera skrivara. Hesin skal vera løgfrøðingur ella hava aðra samfelagsvirkisliga útbúgving, sum gevur virkisligum forfeika at útinna hetta starv.
Stk. 2. Skrivarin kann eftir avtalu við nevndarformannin taka sær lønta hjálp.
Stk. 3. Nevndarlimirnir, skrivarin, og hjálpari hansara, verða lønt eftir nærri avtalu við landsstýrið.
Stk. 4. Nevndin fær við hesi løgtingslóg heimild til at nýta pening til útreiðslur nevndarinnar, tó í mesta lagi 600.000 kr.

§ 6. Nevndin skal enda arbeiði sítt við áliti og uppskotum í seinasta lagi á ólavsoku 1999.

§ 7. § 1 fær gildi, tá ið hetta verður ásett við serstakari løgtingslóg.
Stk. 2. § 2 – § 7 fáa gildi dagin eftir, at løgtingslógin er kunngjørd, og fara úr gildi, tá ið álit nevndarinnar er liðugt.

Almennar viðmerkingar
Málið um at yvirtaka fólkakirkjuna hevur fleiri ferðir verið umrøtt á tingi og í sambandi við skipan av landsstýrinum.

Í 1990 fingu føroyingar sítt egna biskupsdømi, sum flestu føroyingar fegnaðust um. Tjóðveldisflokkurin fyrisat hetta málsøki í tásitandi landsstýrissamgongu og hevði sjálvandi vilja, at vit longu tá yvirtóku fólkakirkjuna, men tíverri fekst ikki semja um tað tá. Vit hildu, at tað stig, ið tá varð tikið, var fyrsta stigið til at fremja eina veruliga yvirtøku av fólkakirkjuni, men vit mugu ásanna, at striltið hevur gingið at koma longur á leiðini.

Tjóðveldisflokkurin heldur, at rætta leitan at fara undir eina veruliga yvirtøku av fólkakirkjuni er nú.

Eftir uppskotinum § 1, so verður tann grundreglustøðið tikin, at fólkakirkjan verður yvirtikin frá 1. januar 2000 at rokna. Men greinin verður ikki sett formliga í gildi sbr. uppskotinum § 7, ti sbr. heimastýrislógini § 3 mugu samráðingar fara fram millum føroyingar og danir, áðrenn yvirtøka kann fara fram, og neyðuga lógargrundarlagið má eisini fáast til vega. Við at orða greinina og seta hana í lógina og kunngera hana er yvirtøkan politiskt staðfest, men formliga yvirtøkan fer ikki fram, fyrr enn hetta verður ásett serstakt við einari løgtingslóg aftaná, at samráðingarnar við danir eru loknar, og lógaruppskot um fólkakirkjuna er greitt at leggja fyri løgtingið.

Kirkjan er B-mál í heimastýrislógini, ið merkir, at samráðingar skulu verða millum heimastýrið og stjórnina, áðrenn málsøkið kann yvirtakast.

Mong eru tey, ið halda, at tað eru danir, ið bera útreiðslurnar av hesum málsøki, men so er ikki. Í sambandi við, at sítandi landsstýrið legði fram uppskot um m.a. fíggjarviðurskifti fólkakirkjunnar, varð upplýst fyri tinginum, at sjálvt um kirkjan er B mál, so rinda føroyingar umleið tveir triðingar av útreiðslunum av kirkjumálum, og danir rinda bert tann eina triðingin.

Hetta tykir okkum í tjóðveldisflokkinum rættiliga órímiligt. Reglan um, at teir, ið skulu gjalda, valda, er ikki galdandi í hesum føri. Hetta eigur at verða broytt, so at tað verða føroyingar, ið átaka sær lóggávuvaldið fyri føroysku kirkjuna, samstundis sum teir átaka sær allar útreiðsfurnar, ið standast av hesum.

Tíl tess at fremja slíka yvirtøku er neyðugt, at føroysk lóggáva verður gjord. Tjóðveldisflokkurin heldur, at rættast er, at landsstýrið setir nevnd at taka sær av nevnda arbeiði. Nevndin eigur at verða mannað við 5 limum, harav teir 3 arbeiða innan fólkakirkjuna, 1 løgfrøðingur og 1 búskaparfrøðingur.

Nevndin skal seta skrivara, ið er løgfrøðingur ella hevur aðra samfelagsyrkisliga útbúgving, sum gevur yrkisligan førleika at útinna hetta starv.

Skrivarin kann eftir avtalu við nevndarformannin taka sær lontan hjálpara. Ilt er at meta um kostnaðin av nevnda arbeiði, men verður skotið upp at nýta í mesta lagi kr. 600.000 tíl endamálið.

Tílíkt arbeiði er stórt og umfatandi, tí eigur nevndin at fáa rímiliga tíð at viðgera málið. Skotið verður upp at leggja álitið fram á ólavsøku 1999.

Grundarlag er so fyri at fáa samtykt nýggja kirkjulóg fyri yvirtøkudagin 1. januar 2000.

1. viðgerð 7. november 1997. Uppskotið varð beint í mentanarnevndina, sum tann 19. december 1997 legði fram soljóðandi:

Álit

Tjóðveldisflokkurin hevur lagt málið fram tann 28. oktober 1997, og eftir 1. viðgerð tann 7. november 1997 er málið beint í mentanarnevndina.

Mentanarnevndin hevur viðgjørt málið og hevur undir viðgerðini býtt seg í fimm minniluttar.

Ein minniluti í mentanarnevndini (Lisbeth L. Petersen og Maria Hansen) hevur hesar viðmerkingar:

Meðan sparingar enn raka meint á nógvum økjum, og fíggjarligu karmarnir eru sera avmarkaðir, og meðan greiða ikki enn er fingin á fleiri longu yvirtiknum máðum, er lotan tíls ikki til at tosa um fleiri yvirtøkur.

Harumframt eigur slíkur spurningur at umhugsast væl, eins og spurningurin um, hvør skal avgera, hvussu nýggja føroyska fólkakirkjan skal skipast og stýrast.

Uppskotið hjá Tjóðveldisflokkinum snýr seg um at seta eina nevnd at fyrireika ætlaðu yvirtøkuna. Nevndin fær ikki langa tíð at arbeiða í.

Samhandsflokkurin tekur ikki undir við málinum, fyrst og fremst tí málið snýr seg um eina yvirtøku. Slík yvirtøka tolir, um meirluti skuldir verðið fyri tí, væl at bíða, til bæði stundir og ráð eru til tess. Eisini eigur spurningurin at viðgerast á nógv breiðari grundarlagi, enn ætlanin tykist veru. Kirkjuráðini og prestar eiga eisini at siga sína hugsan um málið eins og limir fólkakirkjunnar. Løgtingið eigur ikki einsamalt at avgera tann spurningin.

Minnilutin (Lisbeth L. Petersen og Maria Hansen) tekur sostatt ikki undir við uppskotinum.

Ein annar minniluti í mentanarnevndini (Bjarni Djurholm) fatar fram, at føroyska fólkakirkjan á sín nógvum økjum er ólík teirri donsku, og at danska fólkakirkjan á sínum økjum neyvan kann roknast at vera einastu fyrimyndin fyri ta føroysku kirkjuna. M.a. tí heldur minnilutin, at uppskotið at yvirtaka fólkakirkjuna er áhugavert.

Undan hesum uppskotinum hevur mentanarnevndin avgreitt uppskot landsstýrisins um føroysku fólkakirkjuna til løgtingið at taka støðu til. Verða hesi uppskot samtykt, er tað á fyrsta sinni í nýggjari tíð, at øll kirkjuviðurskiftini verða regulerað í dagførdari lóggávu.

Yvirhøvur hava kirkjumyndugleikarnir í Føroyum undir nevndarviðgerðini av kirkjuuppskotum landsstýrisins lagt dent á, at hesar lógir eru neyðugar og hava vist á, at nýggi lógarkarmurin eigur at verða royndur í verki, áðrenn farið verður undir at yvirtaka fólkakirkjuna.

Fyrstu tvey árini av valskeiðinum var Fólkaflokkurin í andstøðu saman við uppskotsstillaranum. Hóast góðir møguleikar tá vóru fyri at funnið saman um líknandi uppskot, so stóð Fólkaflokkurin tá ferð eftir ferð einsamallur við uppskotum, sum bóru á sjálvstýrisleið.

Farna 1½ árið hevur Fólkaflokkurin verið í samgongu, og kennir minnilutin størri ábyrgd mótvegis teimum avtalum, gjørdar eru við samstarvsflokkarnar um loysn á nógvum stórmálum, enn mótvegis flokki í andstøðu.

Valskeiðið er farið at halla, og vísandi til at nýggi fólkakirkjukarmurin eigur at verða royndur í verki, kann møgulig avgerð at yvirtaka fólkakirkjuna bíða, til nýggj samgonga er skipað aftaná komandi val.

Ein triði minniluti í mentanarnevndini (Jógvan Adolf Johannessen) tekur undir við Tjóðveldisflokkinum í tí, at tað er rætt at seta eina nevnd at viðgera fólkakirkjuligu viðurskifti Føroya. Hann heldur, at tað er heint at geta eina serstaka føroyska kirkjulóg, men er ikki samdur við honum í tí, at tíðin er búgvin til yvirtøku av føroysku kirkjuni her og nú - vísandi til fíggjarligu støðu landsins, har grundleggjandi partar av tænastum landsins ikki virka nóg væl. Annars heldur minnilutin, at allar royndir at tillaga donsku lógirnar til føroysk viðurskifti í verulleikanum einans eru fappuloysnir.

Viðvíkjandi uppskotinum um yvirtøku verður annars víst til uppskot Javnaðarfloksins um setan av stjórnmálanevnd.

Ein fjórði minnilutl í mentanarnevndini (Signar á Brúnni) førir fram:

Kirkjulógaruppskotini, ið landsstýrið legði fyri tingið í hesi tingsetu, vóru øll ríkislógartilmæli. Tað merkir, at talan er um at seta danskar lógir í gildi á kirkjuøkinum, tí kirkja okkara er partur av teirri donsku kirkjuni.

Undir fyrstu viðgerð av nevndu málum vóru tað mangir roðarar, ið komu inn á spurningin um at yvirtaka kirkjuna, so at føroyingar sjálvir tóku á seg lóggávuvaldið. Í tí sambandi varð vist á viðmerkingar landsstýrisins til lógaruppskotini, har sagt varð, at hóast kirkjumál eru B-mál, ið merkir, at danir hava lóggávuvaldið á økinum, so eru tað føroyingar, ið rinda teir tveir triðingarnar av tí, tað kostar at reka kirkjuna.

Tjóðveldisflokkurin boðaði tá frá, at hann fór at leggja uppskot fram um at yvirtaka kirkjuna, so vit fingu lóggávuvaldið á økinum, samstundis sum vit átóku okkum at rinda tann seinasta triðingin, ið danir hígartil hava gjørt.

Møguleikin at koma við slíkum uppskoti í sambandi við kirkjulógaruppskot landsstýrisins var ikki til staðar, tí gjørdist tað neyðugt at koma við nýggjum uppskoti.

Tjóðveldisflokkurin leggur stóran dent á, at øll tey fólkakirkjuligu viðurskiftini verða nágreiniliga viðgjørd, og hevur tí skotið upp, at 5-mannanevnd verður sett, ið fær arbeiðssetningin:

1) at skapa neyðugu grundarlagið fyri samrøðingum millum landsstýrið og kirkjumálaráðið um, hvussu yvirtøkan av fólkakirkjuni skal fara fram.

2) at lýsa galdandi fólkakirkjuligu lóggávuna og fíggjarligu viðurskifti fólkakirkjunnar í dag,

3) at lýsa fólkakirkjuligu lóggávuna og fíggjarligu viðurskifti fólkakirkjunnar í londunum næst okkum,

4) at gera uppskot til løgtingslóg um stýri og rikstur av fólkakirkjuni v.m.

Skotið varð upp, at føroyingar yvirtaka umsøkið fólkakirkjan frá 1. januar ár 2000 at rokna, men undir fyrstu viðgerð og undir nevndarviðgerðini hevur Tjóðveldisflokkurin boðað frá, at hann er fúsur at leingja tíðina, um flokkar halda tað verða neyðugt.

Undir nevndarviðgerðini av teimum kirkjulógaruppskotum, ið landsstýrið legði fyri tingið, eru nógvar áhugaverdar upplýsingar komnar, ið m.a. boða frá, at uppskotini hjá landsstýrinum hava ikki fingið ta neyðugu viðgerð, ið tílík týdningarmikil mál hava uppiborið.

Um sjálvan meirkostnaðin av uppskotunum valdar óvissa. Landsstýrið sigur í sínum viðmerkingum, at útreiðslurnar gerast umleið 1,6 mió.kr. dýrari fyrsta árið, síðani 650.000 kr. um árið tey tvey næstu árini. Umboð fyri stiftsstjórnina hava á fundi í mentanarnevndini sagt, at tey kunnu ikki veita nakra vissu fyri, at tølini hjá landsstýrinum fara at halda. Haraftrat skal verða havt í huga, at meirlutin í mentanarnevndini mælir til at gera einstakar broytingar í uppskotum landsstýrisins, ið bera í sær øktar útreiðslur, men hvussu stórar tær gerast, veit eingin.

Meirlutin í mentanarnevndini mælir til, at eitt felagskirkjuskattaprosent verður galdandi í Føroyum, og at hetta eigur ikki at fara upp um 0,30%. Í hesum sambandi er áhugavert at føra fram, at miðalkirkjuskattaprosentið í Danmark er 0,88, ið fer í ein felagsgrunn. Úr hesum grunni verður m.a. partur av prestalønunum goldin (60%), eisini føroyskar prestalønir. Føroyingar fingu úr nevnda grunni umleið 8 mió.kr. í 1996.

Kirkjulógirnar, ið higartil hava verið galdandi fyri Føroyar, tykjast fløktar, og trupult hevur verið at umsitið tær. Hesi viðurskifti fáast ikki í rættlag, fyrr enn vit føroyingar sjálvir áraka okkum alla ábyrgd av kirkjuni.

Minnilutin (Sigrur á Brúnni) mælir løgtinginum til at samtykkja uppskot Tjóðveldisflokksins.

Ein fimti minniluti í mentanarnevndini (Jeuis av Rana) tekur undir við uppskotinum hjá Tjóðveldisflokkinum.

Ein setti minniluti í mentannarnevndini (Lasse Klein) tekur støðu til uppskotið í tingsalinum, men skal tó viðmerkja, at hann hevur ikki verið partur av viðgerðini, orsakað av at hann núsleni er vorðin limur í mentanarnevndini, og at møguligar viðmerkingar verða at fara fram, tá málið kemur til 2. viðgerð.

2. viðgerð 23. januar 1998. §§ 1 og 7 samtyktar 14-4-11. At uppskotið soleidis samtykt kann fara til 3. viðgerð samtykt 17-2-10.

3. viðgerð 13. februar 1998. Uppskot frá Lassa Klein og Suna Jacobsen um at heinta uppskotið aftur í nevnd fall 6-2-24. Uppskotið sum samtykt við 2. viðgerð fall 13-3-16. Uppskotið sostatt fallið.

21 Uppskot til samtyktar um broyting í bankalógini (upplýsingarskylda mótvegis landsstýrinum)

Ár 1997, týsdagin 28. oktober, legði Suna Jacobsen, løgtingsmaður, vegna seg sjálvan og løgtingsmenninar Eydun Videro og Ernst Hansen, fram soljóðandi:

U p p s k o t
til
samtykt

Løgtingið samtykkir at heita á landsstýrið um at taka upp samráðingar við ríkisstjórnina um broytingar í banka- og sparikassalógini, soleiðis at hendu tryggjar, at tað verður ein lógásett skylda hjá donskum ráðharrastovum og Fíggjareftirlitinum alt fyri eitt at fráboða upplýsingar um føroyskar peningastovnar, sum hava - ella metast at kunna hava - ávirkan á fíggjarviðurskifti landsins.

Viðmerkingar

Undir viðgerðini av løgtingsmáli nr. 2/1997: Ríkislógartilmæli um at seta í gildi í Føroyum broytingar í "lov om banker og sparekasser m.v." hevur fíggjarnevndin umrøtt tann vanda, sum stendst av, at føroyskir myndugleikar onga fráboðan fáa frá Fíggjareftirlitinum viðvíkjandi støðuni hjá peningastovnum í Føroyum. Tí verður uppskot sett fram um at fáa broytt hesi viðurskifti.

1. viðgerð 5. november 1997. Uppskotið varð beint í fíggjarnevndina, sum 21. november 1997 legði fram soljóðandi:

Á l i t

Málið varð lagt fram av løgtingsmonnunum Suna Jacobsen, Eyðun Videro og Ernst Hansen tann 28. oktober 1997 og eftir 1. viðgerð tann 5. november 1997 beint í fíggjarnevndina.

Nevndin hevur viðgjørt málið, ið snýr seg um heita á landsstýrið um at taka upp samráðingar við ríkisstjórnina um broytingar í banka- og sparikassalógini soleiðis, at hendu tryggjar, at tað verður ein lógásett skylda hjá donskum ráðharrastovum og Fíggjareftirlitinum alt fyri eitt at fráboða upplýsingar um føroyskar peningastovnar, sum hava - ella metast at kunna hava - ávirkan á fíggjarviðurskifti landsins.

Samsvarandi bankaeftirlitinum kann ráðharrin sum eftirlitsmyndugleiki fáa upplýsingar frá Fíggjareftirlitinum um støðuna hjá peningastovnunum eisini teimum føroysku. Eftir ti uppskoti um broytingar í banka- og sparikassalógini v.m. sum er viðgjørt í tinginum (løgtingsmál nr. 2/1997), kunna Fólkatingsins føstu nevndir fáa upplýsingar frá Fíggjareftirlitinum, tá peningastovnar eru komnir í trongstøðu, og statskassin má hjálpa til. Hendla seinasta broytingin fall tó í tinginum við aðru viðgerð.

Fíggjarnevndin er samd um, at heimastýrið, tvs. løgting og landsstýri, eiga at fáa sama upplýsingar um føroyskar peningastovnar, sum ráðharrin og Fólkatingsins føstu nevndir.

Nevndin tekur undir við framlagda uppskoti, men er samd um at gera orðaljóðið neyvari og setir tí í staðin fyri framlagda uppskot, fram soljóðandi

B r o y t i n g a r u p p s k o t

Løgtingið heitir á landsstýrið um at krevja av stjórnini, at banka- og sparikassalógin verður broytt soleiðis,

1) at tær upplýsingar, sum ráðharrin fær samb. § 50 b, stk. 2, nr. 9, samstundis verða latnar heimastýrinum til kunningar, og
2) at tær upplýsingar, sum Fólkatingsins føstu nevndir ætlandi kunna fáa samsvarandi § 50 b, stk. 2, nr. 10, eisini verða latnar heimastýrinum.

2. viðgerð 26. november 1997. Uppruna-uppskotið var ófrávikið. Broytingaruppskotið frá fíggjarnevndini samtykt 22-0-0.

22 Uppskot til løgtingslóg um broyting í "lov om den offentlige sygeforsikring"

Ár 1997, miðvikudagin 27. oktober, legði Ivan Johannesen, landsstýrismaður, vegna Kristian Magnussen, landsstýrismann, vegna landsstýrið, fram soljóðandi:

Uppskot
til
løgtingslóg um broyting í "lov om den offentlig sygeforsikring"

§ 1.

Í ríkislóg nr. 573 frá 1969 fyri Føroyar "om den offentlige sygeforsikring", sambr. lógarkunngerð nr. 514 frá 21. juli 1989 "om den offentlige sygeforsikring", sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 86 frá 6. juni 1997, verða gjørdar hesar broytingar:

1) § 5, stk. 1 verður orðað soleiðis:
"Einhvør, ið er búsettur í Føroyum ella mynstraður við føroyskum skipi, skal, tá ið hann er fyltur 18 ár, ella tá ið hann verður skrásettur í øki sjúkrakassans, vera limur í sjúkrakassanum. Aðrenn ein er fyltur 18 ár, kann ein søkja um upptøku sum limur í sjúkrakassanum."

2) Aftaná stk. 1 í § 5 verður sett sum nýtt stk. 2:
"*Stk. 2.* Sjúkrakassin setur tey í stk. 1 nevndu í limaskap. Nærri reglur hesum viðvíkjandi verða ásettar í høvuðssamtykt sjúkrakassans."
Stk. 2 verður hereftir stk. 3.

3) Sum nýtt § 5, stk. 4 verður sett:
"*Stk. 4.* Frá tí degi ein persónur er vorðin limur í sjúkrakassanum, hevur hann rætt til veitingar sambært hesi lóg."

§ 2.

Henda lóg fær gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

Viðmerkingar

Sambært galdandi lóg er tað skyldan hjá teimum av lógini umfatað at søkja um upptøku í sjúkrakassanum. Hetta hevur ført við sær, at tað eru nøkur, sum ikki eru vorðin limir í sjúkrakassanum. Ætlanin var, at øll skuldu gerast limir í sjúkrakassanum. Tí verður hetta lógaruppskotið lagt fram, sum fører við sær, at sjúkrakassin fær heimild til at seta øll tey í § 5, stk. 1 umfatað í limaskap.

Serligar viðmerkingar

Ad. § 1, nr. 1) Henda grein ásetir, hvør skal vera limur í sjúkrakassanum. Eisini er møguleiki fyri, at ung undir 18 ár gerast limir, um tey ynskja tað.

Ad. § 1, nr. 2) Sambært hesi grein skipar sjúkrakassin fyri, at fólk gerast limir í sjúkrakassanum. Nærri reglur um, hvussu sjúkrakassin skipar fyri at fólk gerast limir, verða ásettar í høvuðssamtykt sjúkrakassans.

Ad. § 1, nr. 3) Hetta petti staðfestir rættin hjá fólki at fáa veitingar sambært lógini, tá ið tey eru vorðin limir í sjúkrakassanum.

Ad. § 2) Lógin fær gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

1. viðgerð 5. november 1997. Uppskotið varð beint í trivnaðarnevndina. Sum 18. november 1997 legði fram soljóðandi:

Álit

Málið var lagt fyri løgtingið av landsstýrinum 28. oktober 1997 og eftir 1. viðgerð 5. november 1997 beint í trivnaðarnevndina.

Ein samd nevnd mælir løgtinginum til at samtykkja uppskot landsstýrisins.

2. viðgerð 21. november 1997. Uppskot landsstýrisins samtykt 22-0-0. At Uppskotið seleiðis samtykt skuldi fara til 3. viðgerð samtykt 22-0-0

3. viðgerð 25. november 1997. Uppskot landsstýrisins endaliga samtykt 25-0-0.

Løgtingslóg nr. 153 frá 04.12.1997

F.L.-j.nr. 1021-14/95

23 Uppskot til løgtingslóg um kringvarp v.m

Ár 1997, fríggjadagin 7. november, legði Sámal Petur í Grund, landsstýrismaður, vegna landsstýrið, fram soljóðandi:

Uppskot
til
løgtingslóg um kringvarp v.m.

Kapittul 1
Rætturin til at senda kringvarp

§ 1. Rætt til at útvarpa og útluta ljóð- og myndasendingar til almenningin um radioútbúnað ella annan telesamskiftisútbúnað havur:

1) Feløg, samtøk o.o. sambært kap. 2,
2) Útvarp Føroya, sambært kap. 3,
3) Sjónvarp Føroya sambært kap. 4 og
4) persónar, feløg ella kommunur, sum sambært kap. 5 hava fingið loyvi frá loftmiðlanevndini.

§ 2. Rætturin sambært § 1 fevnir um:

1) at útvarpa sendingar til almenningin,
2) at útluta sendingar um felagsantennuútbúnað.

Stk. 2. Felagsantennuútbúnaður í hesi lóg er at skilja sum felagssantennuútbúnaður og annar kaðalútbúnaður til útluting av ljóð- og myndasendingum til privatar búðstaðir.

Kapittul 2
Felagsantennuúthúnaður

§ 3. Útluting í felagsantennuútbúnaði av føroyskum og útlendskum ljóð- og myndasendingum, beinleiðis um antennu ella gjøgnum kaðalútbúnað kann bert verða framd, samstundis sum sent verður frá kelduni og uttan broytingar.

Stk. 2. Tey, ið taka niður frá fylgisveini ella gjøgnum annan útbúnað móttaka og útluta útvarps- ella sjónvarpssendingar smb. stk. 1, hava skyldu til eisini at útluta sendingarnar hjá Útvarpi Føroya og Sjónvarpi Føroya, um sent verður á fleiri enn trimum ræsum og til fleiri enn 20 húski.

Stk. 3. Landsstýrismaðurin í loftmiðlamálum kann í serligum førum loyva frávik frá ásetingunum í stk. 2.

§ 4. Landsstýrismaðurin í samskiftismálum kann áseta nærri reglur um úrbúnað, ætlaðar til virksemi smb. § 3. Í ásetingunum kunnu vera reglur um:

1) Loyvi til at stovna, útbyggja, innretta og nýta felagsantennuútbúnað.
2) Tekniska tilgerð og góðkenning av felagsantennuútbúnaði, herímillum typugóðkenning ella typuskráseting av tí nýtta tilfarinum.
3) Dekoting, gjøldum o.ø.

Kapittul 3
Útvarp Føroya

§ 5. Útvarp Føroya er ein sjálvstøðugur stovnur undir landinum, sum mótvegis borgarunum hevur skyldu til at útvarpa sendingar, ið fevna um tíðindi, upplýsing, mentan og undirhald. Útvarp Føroya skal í programvirksemimum leggja dent á upplýsingar- og talufrælsið, sakliga og óhefta upplýsing og eitt fjølbroytt tilboð, sum varðveitir og fílgar um mál, mentan, átrúnað og siðalæru føroyinga.

Stk. 2. Umframt egnar sendingar kann Útvarp Føroya eisini útvarpa sendingar, annar framleiðsla. Slíkar sendingar koma undir somu treytir, sum nevndar eru í stk. 1.

Stk. 3. Sendingar útvarpsins kunnu sendast um radioútbúnað, herundir fylgisvein, felagsantennuútbúnað umframt ymsar telesamskiftisskipanir. Landið hevur skyldu til at tryggja, at allir borgarar

hava møguleika at hoyra sendingar útvarpsins.
Stk. 4. Útvarp Føroya eigur at leggja dent á, at hava gott føroyskt mál í sínum sendingum.
Stk. 5. Útvarp Føroya kann eisini røkja aðrar uppgávur, sum náttúrliga eru knýttar at virkseminum smb. stk. 1, ella sum hava til endamáls at nýta útgerð, søvn, serkunnleika o.a. hjá stovninum til fulnar. Hetta virksemið kann fara fram í feløgum, sum útvarpið við góðkenning frá landsstýrismanninum í loftmiðlamálum setur á stovn einsamalt ella saman við øðrum.
Stk. 6. Útvarp Føroya hevur skyldu til at taka lut í almennum tilbúgvingarskipanum.

§ 6. Landsstýrismaðurin í loftmiðlamálum setur stjóran í Útvarpi Føroya. Stjórin setur øll starvsfólk og hevur ábyrgdina av dagligu leiðsluni av stovninum eftir reglugerð, ið landsstýrismaðurin í loftmiðlamálum fyrisetur. Stjórin hevur programmábyrgdina og er evsti myndugleiki í programmspurningum.
Stk. 2. Avgerðir, sum Útvarp Føroya tekur í spurningum um góðan fjølmiðlasið, kunnu kærast til fjølmiðlanevndina eftir reglunum í fjølmiðlaábyrgdarlógini.
Stk. 3. Landsstýrismaðurin í loftmiðlamálum setur eina nevnd við 7 limum, harav ein verður tilnevndur formaður, at ráðgeva Útvarpi Føroya viðvíkjandi programmvirkseminum
Stk. 4. Nevndin smb. stk. 3 verður vald fyri fýra ár í senn. Sigur nevndarlimur seg frá, verður annar valdur í hansara stað restina av valskeiðnum. Nevndin skal hava breiða samfelagsliga umboðan. Løgtingslimir kunnu ikki vera limir í programmnevndini.
Stk. 5. Limirnir í programmnevndini fáa goldið samsýning og ferðaútreiðslur eftir reglum landsins um fundarpening og ferðapening.
Stk. 6. Landsstýrismaðurin í loftmiðlamálum ásetur í reglugerðini fyri Útvarp Føroya nærri reglur um virksemið hjá nevndini.

§ 7. Virksemið hjá Útvarpi Føroya verður fíggjað við útvarpsgjaldi, lýsingarinntøkum, inntøkum frá eydnuspølum, ískoytisveitingum (sponsotering) og øðrum virksemi, sum er knýtt at uppgávum stovnsins. Útvarp Føroya kann við góðkenning frá landsstýrismanninum í loftmiðlamálum leggja inntøkugevandi tiltøk í sjálvstøðug feløg, sum útvarpið stovnar einsamalt ella saman við øðrum.
Stk. 2. Virksemið hjá Útvarpi Føroya kann eisini verða fíggjað við játtan á løgtingsfíggjarlógini. Hesin parturin av fíggingini verður at seta sum sjálvstøðugur táttur á løgtingsfíggjarlógini.
Stk. 3. Inntøkurnar, sum eru nevndar í stk. 1 og 2, kunnu bert brúkast til endamál hjá Útvarpi Føroya, hemmdir til virksemi smb. § 5, stk. 5.
Stk. 4. Útvarpsstjórin ger fíggjarætlan og tilráðing um áseting av útvarpsgjaldi, ið verða send landsstýrismanninum í loftmiðlamálum til góðkenningar.
Stk. 5. Ársroknskapurin hjá Útvarpi Føroya verður grannskoðaður av løggildum grannskoðara og sendur landsstýrismanninum í loftmiðlamálum til góðkenningar samhvørt ásetingunum um almennar roknskapir.

§ 8. Til Útvarp Føroya skal rindast útvarpsgjald. Landsstýrismaðurin í loftmiðlamálum ásetur í kunngerð nærri reglur um, hvør skal rinda útvarpsgjald, hvørji tól koma undir gjaldsskyldu, og nær gjaldsskyldan byrjar ella heldur uppat.
Stk. 2. Landsstýrismaðurin í loftmiðlamálum ásetur útvarpsgjaldið fyri eitt ella fleiri ár í senn eftir tilráðing frá Útvarpi Føroya og ásetur nærri reglur um gjaldsskyldu, innheinting av gjøldum, avgreiðslugjald og eykagjald fyri ov seint goldið útvarpsgjald og ásetur somuleiðis støddina á hesum gjøldum.
Stk. 3. Gjøldini, umframt mervirðisgjald sum nevnd eru í stk. 1 og stk. 2, kunnu krevjast inn við panting.

§ 9. Øll, sum útvega sær útvarpstól ella tól, sum koma undir gjaldsskylduna sambært § 8, stk. 1, skulu boða Útvarpi Føroya frá beinanvegin.
Stk. 2. Tey, sum selja, leiga út ella lata frá sær útvarpsmóttakara ella tól, sum koma undir gjaldsskylduna sambært § 8 stk. 1, hava skyldu til at boða Útvarpi Føroya frá innan 30 dagar.
Stk. 3. Landsstýrismaðurin í loftmiðlamálum ásetur nærri reglur um fráboðanarskylduna í stk. 1 og stk. 2.

§ 10. Lýsingar í Útvarpi Føroya skulu vera háttaðar soleiðis, at tær í innihaldi og sniði greitt skilja seg frá øðrum tilfari.
Stk. 2. Lýsingar skulu vera sømiligar, og innihaldið má ikki vera villleiðandi. Lýsingar mugu ikki stríða ímóti galdandi lógum ella fyriskipanum annars.
Stk. 3. Ikki er loyvt at lýsa við heilivági, tuhbaksvørum ella drykkjuvørum, hvørs alkoholinnihald er hægri enn 2,8 prosent vol. Loyvt er ikki at lýsa fyri búskaparliga heftum sjónarmiðum ella fyri átrúnaðarligum ella politiskum áskoðanum.

Stk. 4. Við lýsingar er at skilja lisnar kunngerðir, lisnar lýsingar og ljóðlýsingar.
Stk. 5. Útvarp Føroya ásetur lýsingaprísirnar.
Stk. 6. Útvarp Føroya tekur endaliga avgerð um øll ivamál viðvíkjandi innihaldi og sniði í lýsingunum.
Stk. 7. Landsstýrismaðurin í loftmiðlamálum ásetur nærri reglur um útvarpslýsingar í reglugerðini fyri Útvarp Føroya.

§ 11. Útvarp Føroya hevur heimild til at taka fimóti ískoytisveitingum frá virkjum, stovnum o.ø. til fulla ella lutvísa fígging av sendingum.
Stk. 2. Útvarpssendingar, ið heilt ella lutvíst verða fíggjaðar við ískoytum, skulu hava greitt frámerki við navni á teimum, ið lata ískoyti. Er talan um lutir, ið verða latnir til burturlutingar o.l. í sendingum, er loyvt at nevna navnið á veitaranum í sambandi við burturlutingina.
Stk. 3. Ískoytisveituri má ikki á nakran hátt hava ávirkan á innihaldið í sendingini ella ávirkan á, nær hon verður send. Fíggjarlig ella onnur áhugamál hjá ískoytisveitara mugu heldur ikki ávirka innihaldið í sendingini, ella seta til viks óheftu redaktionellu støðuna hjá Útvarpi Føroya.
Stk. 4. Landsstýrismaðurin í loftmiðlamálum ásetur nærri reglur um ískoytisveitingar til sendingar í reglugerðini fyri Útvarp Føroya.

§ 12. Útvarp Føroya hevur loyvi til at reka eydnuspøl.
Stk. 2. Tá farið verður undir eydnuspøl sambært stk. 1, krevst góðkenning frá landsstýrismanninum í loftmiðlamálum.
Stk. 3. Landsstýrismaðurin í loftmiðlamálum ásetur nágreiniligari reglur fyri eydnuspøl í reglugerðini fyri Útvarp Føroya.

§ 13. Mál og skjøl viðvíkjandi programmvirk-seminum og handilsligum viðurskiftum hjá Útvarpi Føroya eru ikki umfatað av lógini um alment innlit.
Stk. 2. Mál og skjøl viðvíkjandi programmvirk-seminum og handilsligum viðurskiftum hjá Útvarpi Føroya eru ikki umfatað av lógini um almenna fyrisiting.

§ 14. Heimilað er Útvarpi Føroya ókeypis at taka upp og varpa út frá almennum fundum og tiltøkum. Útvarpið hevur skyldu til frammanundan at boða teimum frá, ið skipa fyri.

§ 15. Útvarp Føroya hevur skyldu til at goyma upptøkur av øllum sendingum í minsta lagi í 3 mánaðir. Verður kært um eina sending til fjølmiðlanevndina eftir reglunum í fjølmiðlaábyrgdarlógini, ella verður rættarmál reist í sambandi við eina sending, hevur útvarpið skyldu til at goyma viðkomandi sending, til kæran er liðugt viðgjørd.

§ 16. Landsstýrismaðurin í samskiftismálum hevur ábyrgdina av sendinetinum hjá Útvarpi Føroya, og landskassin ber allan kostnaðin av hesum. Telefonverk Føroya Løgtings umsitur útvarpssendinetið.

Kapittul 4
Sjónvarp Føroya

§ 17. Sjónvarp Føroya er ein sjálvstøðugur stovnur undir landinum, sum mótvegis borgarunum hevur skyldu til at útvarpa sjónvarpssendingar, ið fevna um tíðindi, upplýsing, mentan og undirhald. Sjónvarp Føroya skal í programmvirkseminum leggja dent á upplýsingar- og talufrælsið, sakliga og óheftа upplýsing og veita eitt ljøttáttað tilboð, sum varðveitir og fjalgar um mál, mentan, átrúnað og siðalæru føroyinga.
Stk. 2. Umframt egnar sendingar kann Sjónvarp Føroya eisini vurpa út sendingar, onnur framleiða. Slíkar sendingar kunna undir somu treytir, sum nevndar eru í stk. 1. Sjónvarpið skal framleiða ella lata framleiða so nógv føroyskt tilfar sum tilber.
Stk. 3. Sendingar sjónvarpsins kunnu sendast um radioútbúnað, herundir fylgisvein, felagsantenna-útbúnað umframt ymsar telesamskiftisskipanir. Landið hevur skyldu til at tryggja, at allir borgarar hava møguleika at síggja sendingar sjónvarpsins.
Stk. 4. Sjónvarp Føroya eigur at leggja dent á at hava gott føroyskt mál í sínum sendingunum.
Stk. 5. Sjónvarp Føroya kann eisini røkja aðrar uppgávur, sum náttúrliga eru knýttar at virkseminum sambr. stk. 1, ella sum hava til endamáls at nýta útgerð, søvn, serkunnleika o.a. hjá stovninum til fulnar. Hetta virksemið kann fara fram í felagum, sum sjónvarpið við góðkenning frá landsstýrismanninum í loftmiðlamálum setur á stovn einsamalt ella saman við øðrum.
Stk. 6. Sjónvarp Føroya hevur skyldu til at taka lut í altjóðligum tilbúgvingarskipanum.

§ 18. Landsstýrismaðurin í loftmiðlamálum setur stjórnan í Sjónvarpi Føroya. Stjórin setur alt starvsfólk og hevur ábyrgdina av dagligari leiðslu av stovninum eftir reglugerð, ið landsstýrismaðurin í loftmiðlamálum fyrisetur. Stjórin hevur programm-

ábyrgdina og er evstí myndugleiki í programmspurningum.
Stk. 2. Avgerðir, sum Sjónvarp Føroya tekur í spurningum um góðan fjølmiðlasið, kunnu kærast til fjølmiðlanevndina eftir reglunum í fjølmiðla-ábyrgdarlógini.
Stk. 3. Landsstýrismaðurin í loftmiðlamálum setur eina nevnd við 7 limum, harav ein verður tilnevndur formaður, at ráðgeva Sjónvarpi Føroya viðvíkjandi programmvirkseminum.
Stk. 4. Nevndin smb. stk. 3 verður vald fyri fýra ár í senn. Sigur nevndarlimur seg frá, verður annar valdur í hansara stað restina av valskeiðnum. Nevndin skal hava breiða samfelagsliga umboðan. Løgtingslimir kunnu ikki vera limir í programmnevndini.
Stk. 5. Limirnir í programmnevndini fáa goldið samsýning og ferðaútreiðslur eftir reglum landsins um fundarpening og ferðapening.
Stk. 6. Landsstýrismaðurin í loftmiðlamálum ásetur í reglugerðini fyri Sjónvarp Føroya nærri reglur um virksemið hjá nevndini.

§ 19. Virksemið hjá Sjónvarpi Føroya verður fíggjað við sjónvarpsgjaldi, lýsingarinntøkum, inntøkum frá eydnuspølum, fiskoytisveitingum (sponsorering) og øðrum virksemi, sum er knýtt at uppgávum stovnsins. Sjónvarp Føroya kann við góðkenning frá landsstýrismanninum í loftmiðlamálum leggja inntøkugevandi tiltøk í sjálvstøðug leløg, sum sjónvarpið stovnar einsamalt ella saman við øðrum.
Stk. 2. Virksemið hjá Sjónvarpi Føroya kann eisini verða fíggjað við játtan á løgtingsfíggjarlógini. Hesin parturin av fíggingini verður at seta sum sjálvstøðugur táttur á løgtingsfíggjarlógini.
Stk. 3. Inntøkurnar, sum eru nevndar í stk. 1 og 2, kunnu bert brúkast til endamál hjá Sjónvarpi Føroya, herundir til virksemi smb. § 17, stk. 5.
Stk. 4. Sjónvarpsstjórin ger fíggjarætlan og tilráðing um áseting av sjónvarpsgjaldi, ið verða send landsstýrismanninum í loftmiðlamálum til góðkenningar.
Stk. 5. Ársroknskapurin hjá Sjónvarpi Føroya verður grannskoðaður av løggildum grannskoðara og sendur landsstýrismanninum í loftmiðlamálum til góðkenningar sambært ásetingunum um almennar roknskapir.

§ 20. Til Sjónvarp Føroya skal rindast sjónvarpsgjald. Landsstýrismaðurin í loftmiðlamálum ásetur í kunngerð nærri reglur um, hvør skal rinda sjónvarpsgjald, hvørji tál koma undir gjaldsskyldu, og nær gjaldsskyldan byrjar ella heldur uppat.
Stk. 2. Landsstýrismaðurin í loftmiðlamálum ásetur sjónvarpsgjaldið fyri eitt ella fleiri ár í senn eftir tilráðing frá Sjónvarpi Føroya og ásetur nærri reglur um gjaldsskyldu, innheinting av gjøldum, avgreiðslugjald, og eykagjald fyri ov seint goldið sjónvarpsgjald og ásetar somuleiðis støddina á hesum gjøldum.
Stk. 3. Gjøldini, umframt meirvirðisgjald sum nevnd eru í stk. 1 og 2, kunnu krevjast inn við panting.

§ 21. Øll, sum útvega sær sjónvarpstól ella tól, sum koma undir gjaldsskyldina sambært § 20, stk. 1, skulu boða Sjónvarpi Føroya frá beinanvegin.
Stk. 2. Tey, sum selja, leiga út ella lata frá sær sjónvarpsmóttakara ella tól sum koma undir gjaldsskyldina sambært § 20 stk. 1, hava skyldu til at boða Sjónvarpi Føroya frá innan 30 dagar.
Stk. 3. Landsstýrismaðurin í loftmiðlamálum ásetur nærri reglur um fráboðanarskyldina í stk. 1 og 2.

§ 22. Lýsingar í Sjónvarpi Føroya skulu vera hóttaðar soleiðis, at tær í innihaldi og sniði greitt skilja seg frá øðrum tilfari.
Stk. 2. Lýsingar skulu vera samligar, og innihaldið má ikki vera villleiðandi. Lýsingar mugu ikki stríða ímóti galdandi lógum ella fyriskipanum annars.
Stk. 3. Ikki er loyvt at lýsa við heilivági, tubbaksvørum ella drykkjarvørum, hvørs alkoholinnihald er hægri enn 2,8 prosent vol. Loyvt er ikki at lýsa fyri búskaparliga heftum sjónarmiðum ella fyri átrúnaðarligum ella politiskum áskoðanum.
Stk. 4. Við lýsingar er at skilja lisnar kunngerðir, lisnar lýsingar og mynda- ella filmslýsingar.
Stk. 5. Sjónvarp Føroya ásetur lýsingarprísirnar.
Stk. 6. Sjónvarp Føroya tekur endaligu avgerð um øll ivamál viðvíkjandi innihaldi og sniði í lýsingunum.
Stk. 7. Landsstýrismaðurin í loftmiðlamálum ásetur nærri reglur um sjónvarpslýsingar í reglugerðini fyri Sjónvarp Føroya.

§ 23. Sjónvarp Føroya hevur heimild til at taka ímóti fiskoytisveitingum frá virkjum, stovnum o.ø. til fulla ella lutvísa fígging av sendingum.
Stk. 2. Sjónvarpssendingar, ið heilt ella lutvíst verða fíggjaðar við fiskoytum, skulu hava greitt frámerki við navni ella búmerki hjá feinum, ið lata fiskoyti. Er talan um lutir, ið verða latnir til burturlutingar o.l. í sendingum, er loyvt at nevna navnið á veitaranum í sambandi við burturlutingina.
Stk. 3. Fiskoytisveitari má ikki á nakran hátt hava ávirkan á innihaldið í sendingini ella ávirkan á, nær hon verður send. Fíggjarlig ella onnur áhugamál hjá fiskoytisveitara mugu heldur ikki ávirka innihaldið í

sendingini ella seta til viks óheftu redaktionellu støðuna hjá Sjónvarpi Føroya.
Stk. 4. Landsstýrismaðurin í loftmiðlamálum ásetur nærri reglur um ískoytisveitingar til sendingar í reglugerðini fyri Sjónvarp Føroya.

§ 24. Sjónvarp Føroya hevur loyvi til at reka eydnuspøl.
Stk. 2. Tá farið verður undir eydnuspøl sambært stk. 1, krevst góðkenning frá landsstýrisnamninum í loftmiðlamálum.
Stk. 3. Landsstýrismaðurin í loftmiðlamálum ásetur nærri reglur fyri eydnuspøl í reglugerðini fyri Sjónvarp Føroya.

§ 25. Mál og skjøl viðvíkjandi programvirkseminum og handilsligum viðurskiftum hjá Sjónvarpi Føroya eru ikki umfatað av lógini um almennt innlit.
Stk. 2. Mál og skjøl viðvíkjandi programvirksemi og handilsligum viðurskiftum hjá Sjónvarpi Føroya eru ikki umfatað av lógini um almenna fyrisiting.

§ 26. Heimilað er Sjónvarpi Føroya ókeypis at taka upp og varpa út frá almennum fundum og tiltøkum. Sjónvarpið hevur skyldu til frammanundan at boða teimum frá, ið skipa fyri.

§ 27. Sjónvarp Føroya hevur skyldu til at goyma upptøkur av øllum sendingum í minsta lagi í 3 mánaðir. Verður kært um eina sending til fjølmiðlanevndina eftir reglunum í fjølmiðlaábyrgdarlógini, ella verður rættarmál reist í sambandi við eina sending, hevur sjónvarpið skyldu til at goyma viðkomandi sending, til kæran er liðugt viðgjørd.

§ 28. Landsstýrismaðurin í samskiftismálum hevur ábyrgdina av sendinetinum hjá Sjónvarpi Føroya, og landskassin ber allan kostnaðin av hesum. Telefonverk Føroya Løgtings umsitur sjónvarpssendinetið.

Kapittal 5
Aðrar kringvarpsstøðir

§ 29. Útbreiðsla av kringvarpssendingum um radioútbúnað og felagsantennuútbúnað ella annan telesamskiftisútbúnað, sum ikki koma undir reglurnar í kap. 3 og 4, kann einans fremjast við loyvi frá loftmiðlanevndini smb. § 37.
Stk. 2. Sendiloyvi sambært stk. 1 kann eftir umsókn latast persónum og felagum upp til tíggju ár í senn og kann takast aftur, um so er, at treytirnar í loyvinum ikki verða hildnar.
Stk. 3. Kommunur kunnu fáa sendiloyvi smb. stk. 1, um so er, at endamálið hjá kommununi við programvirkseminum einans er at seta framleiðslu- og sendiútgerð til nýtslu fyri áhugaðar borgarar ella at senda kommununala kunning.
Stk. 4. Ein ábyrgdarpersónur, sum er myndugur, skal hava ábyrgdina av sendiloyvinum sum loyvishavari. Loyvishavarin skal sjálvur útvega sær frekvensloyvi frá avvarðandi myndugleika. Hevur loyvishavarin virksemi í samband við kringvarp, sum krevja onnur loyvi enn sendiloyvi og frekvensloyvi, skal hann somuleiðis útvega sær slík loyvi, samstundis sum hann hevur ábyrgdina fyri hesum virksemi.
Stk. 5. Sendiloyvið til kringvarp, sum fingið er sambært stk. 1 frá loftmiðlanevndini, kann endurnýggjast.
Stk. 6. Sendiloyvi til kringvarp kunnu ikki avhendast.
Stk. 7. Útvegar loyvishavarin sær ikki frekvensloyvi frá avvarðandi myndugleika og onnur neyðug loyvi innan 6 mánaðir eftir at sendiloyvið frá loftmiðlanevndini er givið, fellur sendiloyvið burtur. Loftmiðlanevndin kann undir serligum umstøðum leingja frammanfyri nevndu freist.
Stk. 8. Verður sendiloyvið ikki brúkt í 3 samanhangandi mánaðir eftir at onnur neyðug loyvi eru fingin til vega, fellur tað burtur.

§ 30. Umsóknir um sendiloyvi skulu lýsa ætlaða programvirksemið hjá umsøkjaranum. Treytin fyri sendiloyvinum er, at programvirksemið hjá loyvishavarunum er í samsvar við innihaldið í umsóknini.
Stk. 2. Harumframt skulu umsóknirnar innihalda eina frágreiðing um ognarviðurskifti, leiðslu, tíggjing og eina lýsing av sendi- og framleiðsluútgerð.
Stk. 3. Henda broytingar í programvirksemi, bygnaði, leiðslu og sendiútbúnaði hjá tí, sum fær sendiloyvi til kringvarp smb. § 29, skulu hesar fráboðast loftmiðlanevndini.

§ 31. Til tess at tíggja sendivirksemið er loyvi kringvarpi at senda lýsingar móti gjaldi, taka ímóti ískoytisveitingum og skipa fyri eydnuspølum. Lýsingar, ískoytisveitingar og eydnuspøl koma undir reglurnar um hetta í kap. 3 og kap. 4 í hesi lóg.
Stk. 2. Møguligt onnur loyvi í sambandi við tiltøkini í stk. 1, skal loyvishavarin sjálvur útvega sær.

§ 32. Loyvishavarin hevur skyldu til at goyma upptøkur av øllum sendingum í minsta lagi í 3 mánaðir. Verður kært um eina sending til fjølmiðlanevndina eftir reglunum í fjølmiðlaábyrgdarlógini, ella verður rættarmál reist í sambandi við eina sending, hevur

loyvishavario skyldu til at goyma viðkomandi sending, til kæran er liðugt viðgjørd.

§ 33. Loyvi til útvarp eftir § 29 verða givin við tí treyt, at allar sendingarnar eru á føroyskum máli.

Stk. 2. Loyvi til sjónvarp eftir § 29 verða givin við tí treyt, at sendingarnar í størst møguligan mun verða egintramleiðsla ella onnur framleiðsla á føroyskum.

Stk. 3. Loyvishavarin til kringvarp skal ansa eftir, at sendingar ikki kunna skaða likamligu, sálarligu og siðalagsligu menningina hjá børnum og ungum undir lógaraldur, eitt nú við serliga ónærisligum ella ógrundaðum harðligum innihaldi.

Stk. 4. Sendingarnar skulu ikki á nakran hátt elva til mannmirkan, hatðsskap ella hatur orsakað av búðarliti, kyni, átrúnaði ella tjóðskapi.

Stk. 5. Landsstýrismaðurin í loftmiðlamálum kann áseta reglur um, at í sendivirksemiunum skal serligt fyrilit vísast børnum og ungum.

§ 34. Tað áliggur loyvishavaranum at syrgja fyri, at tað í hvørji sending er ein persónur, sum hevur ábyrgdina av sendingini. Viðkomandi skal hava kunnleika til, hvør hevur tikið lut í sendingini ella á annan hátt lagt hana til rættis.

§ 35. Loyvishavarin, skal syrgja fyri at tað, eftir hvørja sending verður upplýst, hvør hevur ábyrgdina av sendingini.

§ 36. Fyri hvønn dag, ið sent verður, skal loyvishavarin føra sendiskrá við upplýsingum um heiti, innihald, senditíð og sendingaábyrgd.

Stk. 2. Loftmiðlanevndin skal hava útskrift av sendiskránni einaferð um mánaðin.

§ 37. Landsstýrismaðurin tilnevnir eina fakliga loftmiðlanevnd við trimum fólkum, sum viðgerð og tekur avgerð um sendiloyvi sambært § 29, stk. 1.

Stk. 2. Avgerðir hjá loftmiðlanevndini kunnu ikki kærast til hægri fyrisittingarligan myndugleika.

Stk. 3. Í loftmiðlanevndini sita hesir limir: Ein løgfrøðingur sum er formaður, og tveir loftmiðlakønir, harav annar við tekniskum innliti.

Stk. 4. Nevndin sambært stk. 1 hevur eftirlit við, at treytirnar í sendiloyvum til útvarp og sendiloyvum til sjónvarp verða hildnar.

§ 38. Nevndin sambært § 37 verður tilnevnd fyri 4 ár í senn, tó soleiðis, at nevndarlimur verður siandi, til nýggjur er tilnevndur.

Stk. 2. Samstundis verða tilnevnd varafólk eftir somu reglum sum í stk. 1 at taka sæti í nevndini, tá limi beirst frá.

Stk. 3. Limirnir fáa samsýning og ferðaútreiðslur goldnar eftir reglum landsins um fundarpening og ferðapening.

§ 39. Tað áliggur loyvishavaranum smb. § 29 at lúka treytirnar í § 5 í fjølmiðlaábyrgdarlógini.

Stk 2. Avgerðir, sum loyvishavarin av kringvarpi tekur um góðan fjølmiðlasið, kunnu kærast til fjølmiðlanevndina eftir reglunum um hetta í fjølmiðlaábyrgdarlógini.

§ 40. Undirvísingar- og mentamálastýrið hevur skrivstovuhaldið hjá loftmiðlanevndini.

§ 41. Landsstýrismaðurin í loftmiðlamálum kann áseta nærri reglur um kringvarpini í hesum kapitli, herundir reglur um treytir fyri sendiloyvum og útskriving av sendiloyvum v.m.

Kapittul 6
Revsing

§ 42. Um ikki strangari revsing er ásett sambært lóggávuni annars, verður hann revsaður við bót, sum fremur brot á § 1, § 3, stk. 2, § 9 ella § 21.

Stk. 2. Er lógarbrotið framt av einum partafelag, lutafelag ella líknandi, kann áleggjast felagnum sjálvum sektarábyrgd.

Kapittul 7
Gildiskoma o.a.

§ 43. Reglurnar í kunngerð nr. 1. frá 5. januar 1957 um útvarpsáljóð eru galdandi fyri Útvarp Føroya, Sjónvarp Føroya og onnur kringvørp.

§ 44. Henda lóg kemur í gildi 1. januar 1998. Samstundis fer úr gildi løgtingslóg nr. 23 frá 28. mars 1956 um útvarp sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 60 frá 14. mai 1997.

Stk. 2. Loyvið til at reka eydnuspæl v.m., sum Sjónvarp Føroya hevur fingið frá landsstýrismanninum við heimild í § 5, stk. 3 í løgtingslóg nr. 141 frá 20. desember 1996 um Sjónvarp verður framlongt til 1. apríl 1998.

Almennar viðmerkingar

Galdandi lógir um útvarp eru løgtingslóg nr. 23 frá 13. mars 1956, sum seinast er broytt við løgtingslóg nr. 60 frá 14. mai 1997 og løgtingslóg nr. 140 frá 20. desember 1996 um útvarpsnevnd, ið er sama lógin, sum lýst varð í 1957, meðan galdandi lóg um sjónvarp er løgtingslóg nr. 141 frá 20. desember 1996.

Fram til 1996 høvdu Útvarp Føroya og Sjónvarp Føroya einkarrætt. Í desember mánaði 1996 fekk landsstýrismaðurin heimild til at geva øðrum loyvi til at senda útvarp og sjónvarp eftir nærri ásettum reglum. Lógargávan á økinum hevur leingi verið útíðarhóskandi og setti landsstýrið í 1990 eina nevnd at arbeiða við málinum. Henda nevnd legði fram álit í 1991.

Uppskot landsstýrisins til nýggja lóg um kringvørp byggir m.a. á hetta álitið, og álitini frá løgtingsins mentannarnevnd í løgtingsmálunum nr. 48 og 49/1995. Í arbeiði sínum at tilevna lógaruppskotið hevur landsstýrið havt eitt arbeiðsbólk av sakkønum, m.a. við limum úr nevndini, sum tilevnaði álitið frá 1991. Hugt hevur verið at loftuniðlalóggávunum í Grønlandi, Íslandi, Noregi, Svøríki, Finnlandi og Danmark. Eisini hevur Undirvísingar- og mentamálastýrið havt fund um nærvørp við Thue Christiansen, skrivstovustjóra í grønlendska mentamálastýrinum, tá hesin var á vitjan í Føroyum í summar. Fundur hevur verið við Telefonverk Føroya Løgtings um tekniskar spurningar.

Lógaruppskotið um kringvørp snýr seg um rættin til at senda í Føroyum, um ásetingar viðvíkjandi móttøku og útluting av útlendskum útvarps- og sjónvarpstilfari, um Útvarp Føroya og Sjónvarp Føroya og um onnur kringvørp.

Samstundis sum uppskotið gevur heimildir til og ásetir reglur um virksemið hjá nýggjum og óheftum kringvørpum í Føroyum, miðar tað eisini eftir at tryggja, at borgararnir hava atgongd til eitt alment meginútvarp og eitt alment meginsjónvarp, sum hava kunnar at virka innanfyri. Meginvørpini skulu røkja tær sonevndu 'public service' skyldurnar, sum eru galdandi fyri tær útvarpsstøðir og sjónvarpsstøðir í okkara parti av heiminum, sum tað almenna eigur ella hevur serligar sáttmálar við. Hesar meginreglur áleggja Útvarpi Føroya og Sjónvarpi Føroya eftir førimuni at røkja áhugamálini hjá øllum føroyingum. Vørpini skulu umboða frælsið hjá hvørjum einstøkum eftir egnum tykki at leita sær samfelagsliga ella mentanarliga upplýsing og frælsið hjá viðkomandi at siga sína hugsan. Hetta merkir, at útvarpið og sjónvarpið í programmvirkseminum skulu arbeiða óheft av øllum politiskum valdi ella serhugamálum. Upplýsingin skal vera saklig og óheft. Útvarp Føroya og Sjónvarp Føroya skulu senda eitt so breitt og fjøltáttað tilboð sum tilber við tíðindum, upplýsing, mentan og undirhaldi.

Almennu loftmiðlarnir hava eina týðandi uppgávu at røkja, og í endamálsgreinunum í lógaruppskotinum verður sagt, at stovnarnir í programmvirkseminum skulu leggja dent á eitt fjøltáttað tilboð, sum varðveitir og fjálgar um mál, mentan, útrúnað og siðalæru føroyinga.

Bæði tøkniliga og innihaldsliga eru loftmiðlar kring allan heim fyri stórum broytingum, og nýggjar uppgávur leggjast alfurat. Stovnar sum Útvarp Føroya og Sjónvarp Føroya byggja upp stóra vitan og førleikar á ymsum økjum, og tí heldur landsstýrið, at lógin um kringvørp skal geva stovnunum rúmd til eisini at røkja aðrar uppgávur, sum eru knýttar at meginvirkseminum. Á hendan hátt kunnu teir gera fullgóða nýtslu av tøkni, søvnunum og tí serliga sakkannleikanum, bæði fyri at gera sínar egnu tænastur betri og fyri at tryggja sær innløkur at virka fyri.

Galdandi loftmiðlalóggáva er fevnd av 3 lógum, nevniliga lógunum um útvarp, útvarpsnevnd og um sjónvarp. Eins og mentannarnevndin hjá løgtinginum hevur lýst frá, hevur landsstýrið valt at leggja lógarverkið um loftmiðlarnar í eina lóg.

Uppskotið til nýggju lógina fevnir um eitt tekniskt fyribrigdi og eitt samfelagsligt fyribrigdi. Tekniska fyri-

brigdi radio, ið er upplinning, ið ger tað møguligt at senda signal úr einum stað í annað. Hetta verður kallað at senda í hesi lóg.

Tað verður málsliga eitt sindur fløkt, tá orðið at senda eisini verður nýtt um tað samfelagsliga fyribrigdið, sum er at senda ávíst slag av tilfari t.e. útvarps- og sjónvarpssendingar um hesa teknisku uppfinning. Í dag merkir hetta orð eisini tað, at senda yvir kaðal.

Eink kann gerast við tað, at orðið senda hevur hesar báðar merkingarnar.

Hinvegin hevur landsstýrið valt at nýta eitt orð, nevniliga kringvarp, sum felagsheiti fyri sjónvarp og útvarp. Hetta er gjørt, so orðið útvarp ikki fær ov nógvar ymiskar merkingar. Tað verður vanliga brúkt bæði um at senda ljóð einsamalt mótvegis at senda myndir og ljóð (útvarp ávikavist sjónvarp), tað verður brúkt um stovnin Útvarp Føroya og virksemið hansara og endiliga verður orðið brúkt í týdningi, vit her vilja leggja í orðið kringvarp.

Kringvarp merkir sostatt tað at senda tilfar í síni heild, tvs. bæði útvarp og sjónvarp. Og uttan mun til um hetta verður gjørt tráðleyst frá radiosendara á jørð, tráðleyst yvir fylgisveina, í kaðalsambandi ella gjøgnum fleiri tekniskar sendihættir saman.

Sambært lógaruppskotinum verður loftmiðlalóggávan í mun til galdandi lógir víðkað soleiðis, at eisini onnur enn almennu vørpini kunnu senda kringvarp. Talan er um sendiloyvi til persónar, feløg og kommunur. Í lógini verður tilskilað, um undir hvørjum treytum sendiloyvið verða givin. Ein serlig loftmiðlanevnd skal viðgera og taka støðu til umsóknir um sendiloyvi. Talan er um eitt sokallað operatiónsloyvi ella programloyvi. Frekvensloyvi skal loyvishavarin sjálvur útvega sær. Seinast nevnda loyvi verður givið úr Telestyrelsen í Danmark.

Landsstýrið leggur stóran dent á, at allir loftmiðlar í ávísan mun verða stillaðir javnbjóðis, tá talan er um innlit til programvirksemi. Sum nevnt framman fyri, hava almennu vørpini eina "public service" skyldu mótvegis øllum borgarum landsins. Tí hevur landsstýrið valt, at reglurnar í galdandi útvarpslóg um útvarpsgjald og reglurnar í galdandi sjónvarpslóg um sjónvarpsgjald verða varðveittar í nýggju lógini, tá talan er um almennu vørpini Útvarp Føroya og Sjónvarp Føroya. Tá talan hinvegin er um at senda lýsingar, skipa fyri eydnuspølum og taka ímóti fiskoytisveitingum, eru almennu vørpini og hini kringvørpini sett javnbjóðis.

Landið eigur sendinetið hjá almennu vørpunum, og má endamálið við almennu sendinetunum vera at skapa tryggar kanningar um eitt meginútvarp og eitt meginsjónvarp við "public service" skyldu mótvegis almenningi landsins. Landsstýrið heldur, at allar sendingar á almennu sendinetunum eiga at lúka somu krøv. Tí eiga onnur kringvørp at senda á egnum sendineti, men í uppskotinum eru ásetingar, ið skapa møguleika fyri, at áhugaðir kunnu gera sendingar fyri almennu vørpini eftir eini skipan, ið líkist bandvirkstoðum í grannalondunum okkara.

Fíggjarliga avleiðingin fyri landskassan av lógaruppskotinum er, at einar 1100000 kr. skulu játtast til raksturar av loftmiðlanevndini umframt eisini nakað av pening til Undirvísingar- og mentamálastýrið til skrivstovuhald v.m.

Víst verður annars til viðmerkingarnar til tær einstøku greinirnar.

Viðmerkingar til tær einstøku greinirnar

Kap. I

Ad. § 1. Í hesi § verður skotið upp, hvørjum skal vera loyvt at senda ella útleita útvarp og sjónvarp. Ásett verður, at verandi almennu loftmiðlarnir Útvarp Føroya og Sjónvarp Føroya hava rætt at senda. Onnur kunnu søkja um loyvi at senda ávikavist sjónvarp og útvarp. Talan er um persónar, felagsskapir og kommunur.

Ad. § 2. Í stk. 1, verður hugtakið um at varpa út og útluna nærri útgreinað. Sending av programmum til almenningin um radioútbúnað, er eisini fevnd av lógini um radiosamskifti (lógarkunngerð nr. 210 frá 6. apríl 1976 av lóg um um "radiokommunikation"). Henda lóg ásetir, at ein og hvør stovnan og rakstur av kringvarpsstøð av hesum slag skal hava loyvi til hetta. Talan er um eitt sokalla frekvensloyvi. Í praksis er tað Telestyrelsen í Danmark, sum gevur slíkt loyvi. Operatiónsloyvi til kringvarp verður hinvegin sambært uppskotinum givið eftir reglunum í lógini um kringvarp v.m. Av tí, at kringvarp eisini kann sendast um telesamskiftisútbúnað, er áseting um hetta tikin við.

Stk. 2 snýr seg hugtakið felagsantennuútbúnaður, sum er allur kaðalútbúnaður til útluting av programmum til privatir híbstaðir.

Kap. 2

Ad. § 3. Í hesi grein eru ásetingar um móttoku av útlendskum sjónvarpsstillari frá fylgisveini ella øðrum telesamskifti til víðari útluting til fleiri móttakarar í Føroyum. Í stk. 1 verður ásett, at loyvi til tílíkt virksemi verður avmarkað til beinleiðis og óskerda útluting. Loyvi til sendivirksemi skal í staðin verða givið av sertigu loyvisnevndini smb. kap. 5 í hesi lóg.

Stk. 2 ásetur, at tey, ið fremja virksemi smb. stk. 1, undir serligum viðurskiftum skulu luta út sendingarnar hjá Útvarpi Føroya og Sjónvarpi Føroya. Tílíkar ásetingar eru eisini at finna í grannalondunum, og tær hava til endamáls at geva borgarunum í minsta lagi eins góða atgongd til teir heimligu loftmiðlarnar sum til útlendsku.

Í stk 3 er tó heimild til at loyva frávik frá hesi reglu.

Ad. § 4. Hendan greinin gevur landsstýrismanninum í samskiftismálum heimild til at gera ásetingar um virksemið smb. § 3, m.a. fyri at tryggja, at ymsir felagsantennuskipanir ikki órógva hvørja aðra og fyri at hava eftirlit við, at øll formlig viðurskifti eru í lagi, eitt nú viðvíkjandi spurninginum um dekoding o.t. Hetta kann m.a. hava týdning, tá ivamál stinga seg upp í sambandi við lógina um upphavsrætt.

Kap. 3 og 4

Ad. §§ 5 og 17. Í stk. 1 verða Útvarp Føroya ávikavist Sjónvarp Føroya nevndir "sjálvstøðugur stovnur undir landinum". Hetta er sama heiti, sum samsvarandi stovnar í okkara grannalondum hava. Orðið sjálvstøðugur sipar til programvirksemið, t.v.s., at stovnurin skal hava sjálvstøðu frá landsstýrismanninum viðvíkjandi programpolitikkinum. Í stk. 1 verður annars ásett, hvørjar uppgávur stovnurin skal røkja. Sum heild kann sigast, at uppgávan hjá stovninum er at reka sonevnt "Public Service" virksemi.

Í stk. 2 er ásett, at útvarpið/sjónvarpið eisini kann varpa út sendingar, ið onnur framleiða. Við hesum er hugsað um fast skipað bandverkstøð, ið kunnu geva áhugaðum atgongd til útgerð og professionella vegleiðing til at gera sendingar, ið redaktionelt og tekniskt líka tey krøv, ið meginstovnarnir hava til sínar egnu sendingar. Útvarpið hevur, sum er, eina skipan, ið inniber um bandverkstøð. Umframt føstu starvsfólkini í útvarpinum gera eisini eitt stórt tal av øðrum fólkum sendingar fyri útvarpið, og ein hufalsliga stórur partur av sendiskránni verður framleiddur av free lance medarbeiðarum. Sjónvarpið skal framleiða so nógv føroyskt tilfar sum tilber og eisini eftir førimuni eggja øðrum til at gera føroyskt tilfar.

Í stk 3 er lagt upp fyri stóru menningini innan kunningartøkni. Hugsast kann, at útvarpið og sjónvarpið í framtíðini eisini fara at hava samskifti við hurtaraumar og hyggjaraumar á ein annan hátt, enn tann, ið vit kenna í dag, eitt nú um Internetið. Greinirnar áseta eisini, at landið hevur skyldu til at tryggja, at almenna sendinetini røkka øllum borgarum í landinum.

Í stk. 4 er ásett, at útvarpið/sjónvarpið hevur skyldu til at bróka gott og fyrimyndarligt føroyskt mál í sendingunum. Hetta eigur at verða gjørt m.a. við støðugt at viðlíkahalda og menna málsliga forleikan hjá teimum, ið gera sendingar.

Í stk. 5 verður heimilað útvarpinum og sjónvarpinum at reka annað virksemi, sum náttúrliga er knýtt at virkseminum hjá stovnunum. Tann stóra menningin innan kunningartøkni skapar støðugt nýggjar møguleikar. Endamálið við tílíkum virksemi er at bjóða borgarunum tænastur, sum bert Útvarp Føroya og/ella Sjónvarp Føroya eru før fyri at bjóða. Her verður hugsað um eitt nú útgávuvirksemi, tekniskar veitingar, samsvirksemi og tíðindatænastu til føroyingar uttanlands. Tílíkt virksemi skal í minsta lagi vera útreiðsluneutralt. Í ávísum førum kann hugsast, at tílíkt virksemi verður framt í samstarvi við onnur, ella at tað verður best skipað innan sjálvstøðugar fíggjarkarmar, og tí verður mælt til, at heimild er til, at tílíkt virksemi fer fram í felagum, sum útvarpið og/ella sjónvarpið við góðkenning frá landsstýrismanninum í loftmiðlamálum setur á stovn einsamalt ella saman við øðrum.

Eftir stk. 6 hava útvarpið og sjónvarpið skyldu til at luttaka í eini almennari tilhágvingarskipan, tá ein tílík verður skipað.

Ad. §§ 6 og 18. Greinirnar áseta bygnaðin hjá ávikavist Útvarpi Føroya og Sjónvarpi Føroya, ið er í samsvari við § 1 í stýrisskipanarlógini. Í stk. 1 er ásett, at útvarpsstjórin/sjónvarpsstjórin hevur endaligu programmábyrgdina. Hetta er samsvarandi § 5, stk. 2 í fjølmiðlaábyrgdarlógini, ið ásetur: "Ved redaktør forstås den, der er beføjet til at træffe endelig beslutning om at udsende et program eller indslag. Der kan kun være én redaktør". Løgtingið hevur samtykt fjølmiðlaábyrgdarlógina, og hon kemur í gildi saman við nýggju lógini um kringvarp.

Stk. 2 vísir til reglurnar um kæru í fjølmiðlaábyrgdarlógini.

Í stk. 3-5 eru ásetingar um eina ráðgevandi programmnevnd. Eftir veraldi skipan hava útvarpsnevndin ávikavist sjónvarpsnevndin programmábyrgdina, meðan stjórarnir hava fíggjarligu ábyrgdina. Neyðugt er, at programmábyrgd og fíggjarlig ábyrgd liggja á sama staði. Programmnevndin skal koma saman nakrar ferðir um árið at eftirmeta programmvirksemið og at seta fram uppskot viðvíkjandi programmvirkseminum. Programmnevndin skal hava breiða samfelagsliga umboðan. Fyri at politiska valdið ikki skal hava ávirkan á programmvirksemið hjá útvarpinum og sjónvarpinum, verður skotið upp, at løgtingslimir ikki kunnu vera limir í programmnevndini hjá hesum báðum stovnum.

Ad. §§ 7 og 19. Greinirnar áseta inntøkugrundarlagið hjá almennu loftmiðlunum. Skotið verður upp, at útvarpið og sjónvarpið verða fíggjað við ávikavist útvarpsgjaldi og sjónvarpsgjaldi, og at útvarpið og sjónvarpið harumframt hava javnbjóðis atgongd til at útvega sær inntøkur við at senda lýsingar, at skipa fyri spæli og at útvega sær ískoytisveitingar (sponsorering) umframt við virksemi, sum er knýtt at uppgávum stovnanna annars.

Eftir stk. 2 kann virksemið hjá útvarpinum/sjónvarpinum eisini fíggjast við játtan á fíggjarlógini. Í álitunum til løgtingsmálini nr. 48 og 49/1995 segði ein sand mentanarnevnd, at vit eiga at hava eitt megintútvarp og eitt megnsjónvarp, sum verða stuðlað á fíggjarlógini. Mælt verður til, at bert hesin parturin av fíggingini verður tikin við á løgtingsfíggjarlógini. Dømir um serliga fígging á løgtingsfíggjarlógini kundi verið stuðul úr landskassanum til at føroyska útlendskt tilfar í sjónvarpinum, ella stuðul til at røkja virðismiklu søvn útvarpsins.

Eitt annað øki, landsstýrið hevur í huga, sum serstakt øki, ið kann fíggjast yvir løgtingsfíggjarlógina er skipan og rakstur av handverkstøðum, har áhugað privatfólk undir ávísum treytum kunnu fáa lógvi til at gera sendingar. Slíkt virksemi krevur útgerð og dugnaligt fólk at vegleiða einstaklingum, sum Útvarp Føroya og Sjónvarp Føroya sum er ikki hava fíggjarligan ella annan møguleika til at veita.

Ásetingin í stk. 3 er eisini í veraldi útvarpslóg og sjónvarpslóg. Í stk. 4 og 5 eru ásetingar um fíggjaractan, áseting av útvarpsgjaldi og grannskoðan. Rokniskaparviðurskiftini hjá útvarpinum og sjónvarpinum koma annars undir lógina um landsins almenna rokniskaparhald v.m. og fyrisetingar, ið verða gjørdar við heimild í hesi lóg.

Ad. §§ 8 og 9 ávikavist 20 og 21. Greinirnar áseta reglurnar um útvarpsgjald og sjónvarpsgjald. Reglurnar verða nærri útgreinaðar í serligum kunngerðum. Sum nakað nýtt kann landsstýrismaðurin í loftmiðlamálum áseta útvarpsgjaldið/sjónvarpsgjaldið fyri fleiri ár í senn. Tað verður mett at vera ein fyrimunur fyri stovnarnar, at teir kenna framtíðar fíggjarligu fortreytirnar.

Ad. §§ 10, 11 og 12 ávikavist 22, 23 og 24. Greinirnar áseta høvuðsreglurnar, sum skulu galda fyri lýsingar, áskoytisveitingar og eydnuspøl í Útvarpi Føroya og Sjónvarpi Føroya. Nærri reglur verða ásettar í reglugerðunum fyri stovnarnar. Viðvíkjandi verandi spølum í almennu vørpunum verður vist til viðmerkingarnar undir ad. § 44, stk 2.

Ad. §§ 13 og 25. Greinirnar hava fyrst og fremst til endamáls at geva útvarpinum og sjónvarpinum møguleika fyri at verja sínar keldur. Sama regla er galdandi í Danmark fyri Danmarks Radio og TV2.

Ad. §§ 14 og 26. Sama regla er í verandi útvarpslóg og sjónvarpslóg. Almennir fundir og tiltøk verða í hesum samhandi mentað sum fundir og tiltøk, har almenningurin hevur ókeypis atgongd. T.v.s. at til konsertir, sjónleikaframførðslur, íróttakappingar o.t. krevst vanliga serligt loyvi frá fyrireikarunum.

Ad. §§ 15 og 27. Henda ásetingin er samsvarandi § 7. stk. 1 í fjølmiðlaábyrgdarlógini.

Ad. §§ 16 og 28. Greinirnar áseta, at tað er uppgávan hjá landinum at reka almennu útvarps- og sjónvarpssendinetini.

Kap. 5

Ad. § 29. Í stk. 1 er ásett, at loyvi krevst frá loftmiðlanevndini til kringvarp. Við kringvarp skilst útvarp og sjónvarp. Við sendiloyvi skilst loyvi, at senda við heimild í hesi lóg - eitt sokalla operatiónsloyvi.

Stk. 2. lýsir hvør kann fáa loyvi at senda, at loyvi eru tíðaravmarkað, at loyvi kunnu takast aftur um treytirnar í loyvinum ikki vera hildnar og at sendiloyvi kunnu endurnýggjast.

Stk. 3. Her verður skotið upp, at møguleiki skal vera hjá kommununum at fáa sendiloyvi. Í mun til sendiloyvi sum verður latið persónum og felagum, er sendiloyvi hjá kommununum avmarkað til at seta sendiútgerð til nýtslu fyri áhugaðar borgarar og at senda kommunala kunning. Loyvishavarin hjá kommununum er býráðsformaðurin/ bygdaráðsformaðurin í avvarandi kommunu.Viðvíkjandi ábyrgdini av sendingunum sum borgararnir senda verður vist til ad. § 34 og ad. § 39

Í stk. 4 verður skotið upp, at ábyrgdarpersónurin av sendiloyvinum skal vera myndugur. Hevur loyvishavarin til kringvarp virksemi, sum krevja onnur loyvi enn sjálvt sendiloyvi, skal hann eisini útvega sær slík loyvi. Her verður serliga hugsað um upphavsrættarlig loyvi og loyvi til inntokugevandi tiltøk ostr.

Stk. 5 gevur loftmiðlanevndini heimild til at endurnýggja loyvi til kringvarp.

Í stk. 6 er ásett, at sendiloyvi ikki kunnu avhendast. Sostatt skal persónur ella felag, sum ætlar at yvirtaka sendiloyvi til kringvarp søkja loftmiðlanevndina um sendiloyvi eftir ásetingunum í hesi lóg.

Í stk. 7 er ásett, at útvegar loyvishavarin sær ikki frekvensloyvi frá avvarandi myndugleika og onnur neyðug loyvið innan 6 mánaðir eftir at loyvið frá loftmiðlanevndini er givið. Annars sendiloyvið burtur og søkjast má av nýggjum. Undir serligum umstøðum er møguleiki fyri at leingja frammanfyri nevndu freist.

Í stk. 8 verður skotið upp, at gevst loyvishavarin at senda í 3 samanhangandi mánaðir, fellur sendiloyvi burtur og má søkjast um sendiloyvi av nýggjum, um viðkomandi framhaldandi ætlar at senda.

Ad. § 30. Í stk. 1 er ásett,at umsóknir um sendiloyvi skulu lýsa ætlaða programmvirksemið, tvs. hvat slag av sendingum talan er um, nær ætlanin er at byrja at senda, senditíðir v.m. leiðslaviðurskifti og tílíkt. Ásett er, at treytin fyri sendiloyvinum er, at sent verður í samsvar við lýsingina í umsóknini.

Í stk. 2 verður skotið upp, at umsóknir um sendiloyvi skulu greiða frá ognarviðurskiftum, leiðslu, figging og eina lýsing av sendi- og framleiðslurútgerð. Henda frágreiðing skal geva eina samlíkan um, at tað figgjarliga grundarlagið er í lagi, og at ognarviðurskiftini eru greið. Um so er, at upplýsingarnir ikki eru nøktandi, kann loftmiðlanevndin sýta eini møguligari umsókn.

Í stk. 3 er áett, at loftmiðlanevndin skal hava fráboðan, um tað henda broytingar í leiðsfu og sendiútbúnaði hjá tí, sum hevur sendiloyvi. Orsøkin til hesa áseting er, at loftmiðlanevndin skal hava møguleika at fylgja við broytingunum, og at hesar eru í samsvar við lógina.

Ad. § 31. Skotið verður upp, at kringvørpini sambært kap. 5 fáa sama rætt sum almennu vørpini at senda lýsingar, taka ímóti fiskoytisveitingum og at hava eydnuspøl. Loyvi til tilíkt virksemi verður givið eftir reglunum um hetta í kap. 3 og 4 í lógini.

Ad. § 32. Endamálið við hesi § er, at møguleiki skal vera fyri bæði hjá loftmiðlanevndini og øðrum eftirlitsstovnum, at kanna, um sendistøðin (ábyrgdarhavandi) hevur fylgt galdandi reglum v.m., tá kærumál o.a. stinga seg upp.

Ad. § 33. Eitt av høvuðsendamálunum við at avtaka einkarrættin í fjør var m.a., at kappingin skal styrkja tann føroyska partin í okkara loftmiðlum. Útvarp Føroya hevur altíð bert sent føroyskar sendingar og er tað tí rímiligt, at seta somu krøv til privatu útvørpini. Í Sjónvarpi Føroya er støðan ein annur, har verður bert ein partur av senditíðini nýttur til føroyskar sendingar. Tað er tí veruleikafjart og kappingaravlagandi fyri ta privatu sjónvarpsstøðina at krevja at hon skal senda alt á føroyskum. Í ásetingini eru eisini ávísar avmarkingar um, hvat ein kann senda. Her verður hugsa um ónærligar sendingar, sendingar um harðskap og mismun vegna húðalit, kyn, átrúnað ella tjóðskap.

Ad. §§ 34 og 35. Hetta verður gjørt bæði fyri at upplýsa lurtaran/hyggjarin og fyri, at eingin misskiljing skal standast av, hvar ábyrgdin liggur, um møgulig kærumál stinga seg upp.

Ad. § 36. Tit tess at tryggja at ábyrgdin fyri sendingunum verður skrásett, verður skotið upp, at sendiskrá yvir upplýsingar um heitið á sendingini, innihald, nær hon er send og hvør hevur sendiábyrgdina. Loftmiðlanevndin skal hava sendiskránna einaferð um mánaðin, soleiðis at hon kann røkja eftirlitsuppgávurna.

Ad. § 37. Sambært hesi grein skal ein serlig loftmiðlanevnd tilnevnd av landsstýrismanninum taka avgerðir um sendiloyvi til kringvarp eftir § 29 og hava eftirlit við, at treytinar í givnum loyvum vera hildnar. Avgerðir hjá loftmiðlanevndini kunnu ikki kærast til hægri fyrisitingarligan myndugleika. Landsstýrismaðurin hevur sostatt onga ávirkan á, hvør ið fær sendiloyvi. Loftmiðlanevndin verður tilnevnd soleiðis, at sakkunnleikin myndar nevndina, t.v.s. løgfrøðiliga, loftmiðlatøkniliga og loftmiðlaliga.

Ad. § 38. Skotið verður upp, at loftmiðlanevndin verður tilnevnd fyri 4 ár í senn, at tilnevnd veru varafólk at taka sæti í nevndini, tá limir berst frá at møta, og at nevndarlimirnir fáa ferða- og fundarpening úgoldnar eftir reglum landsins um hetta.

Ad. § 39. Í hesi grein verður skotið upp, at foyvisbavarin av kringvarpi sambært § 29 í hesi lóg, skal líka treytirnar í § 5 í loftmiðlaábyrgdarlógini. § 5 í seinast nevndu lóg áseir m.a., at fjølmiðlanevndin sambært fjølmiðlaábyrgdarlógina skal hava at vita, hvør er ritstjóri fyri sendivirkseminum, samstundis sum givin verður ein atlýsing av hugtakinum ritstjóri.

Ad. § 40. Skrivstovuhaldið hjá loftmiðlanevndini verður samsvarað hesi grein tikt av Undirvísingar- og mentamálastýrinum. Loftmiðlanevndin er tó sjálvstøðug í mun til Undirvísingar- og mentamálastýrið soleiðis at skilja, at hon ikki skal taka móti boðum frá stýrinum.

Ad. § 41. Í hesi áseting verður heimilað landsstýrismanninum at gera nærri reglur um kringvørp, breytir fyri sendiloyvum og útskriving av sendiloyvum. Landsstýrismaðurin kann sostatt, um tørvur er á tí, áseta nærri reglur um hesi viðurskifti.

Kap. 6

Ad. § 42. Skotið verður upp, at brot á § 1, sum snýr seg um rættin at senda, brot á § 3, stk. 2 um skyldu at útluta sendingar hjá almennu vørpunum og brot á ávikavist §§ 9 ella 21 um fráboðannarskylduna til Útvarp Føroya og Sjónvarp Føroya í samband við útvegan av útvarpsmóttakara og sjónvarpsmóttakara og øðrum tólum verður revsað við bót.

Kap. 7

Ad. § 43. Reglurnar í hesi kunngerð byggja lutvíst á "midlertidig bekendtgørelse nr. 40 frá 27. november 1940 om foranstaltninger mod forstyrrelse af radiomodtagning" og § 7 í galdandi lóg um útvarp. Samsvarað § 8, stk. 3 í galdandi sjónvarpslóg er sama kunngerð eisini galdandi fyri sjónvarpið.

Ad. § 44. Galdandi lóg um útvarpsnevnd og galdandi lóg um sjónvarp fara úr gildi 1. januar 1998. Skotið verður tí upp, at lógin um kringvarp fær gildi frá 1. januar 1998, og at lógin um útvarp fer úr gildi sama dag.

Ad. § 44, stk. 2. Seinasta vetur gav landsstýrismaðurin við heimild í § 5, stk. 3 í sjónvarpslógini sjónvarpinum loyvi til at skipa fyri eydnuspølum v.m. Hetta loyvið er galdandi til 1. januar 1998. Fyri at virksemi hjá sjónvarpinum á hesum øki ikki skal steðga upp 1. januar 1998, verður skotið upp, at loyvið sjónvarpsins til eydnuspæl v.m. verður framlongt til 1. apríl 1998. Viðvíkjandi happadráttarloyvinum hjá Útvarpi Føroya, so er hetta ásett í løgtingslóg nr. 157 frá 6. desember 1995 um happadráttarloyvi til Útvarp Føroya. Hetta loyvi er samsvarað lógini galdandi fyri 5 ár.

1. viðgerð 18. november 1997. Uppskotið verður heinvíst í mentamálanevndina, sum tann 4. februar 1998 legði fram soljóðandi:

Álit

Nevndin hevur viðgjørt málið á fundum 9. desember 1997, 17. desember 1997, 13. januar 1998, 15. januar 1998, 22. januar 1998, 29. januar 1998 og 3. februar 1998

Nevndin hevur undir viðgerðini havt fund við umboð fyri blaðmannafelagið, blaðútgevarafelagið, mervarpið "Lindin", sjónvarpið, útvarpið, útvarps- og sjónvarpsnevndirnar, telefonverkið, ávís eigarafeløg, kaðalsjónvarpsfyritøkn og við Ivan Johannesen, landsstýrismann.

Nevndin er samd um, at mæla løgtinginum til at samtykkja uppskotið við ávisum niðanfyri tilmæltum broytingum.

Ein samd nevnd setir fram soljóðandi

Broytingaruppskot

1) Í § 1 verður 1) orðað soleiðis: "1) Felløg, sumtøk, kommunur o.o. sambært kap. 2."
2) Í § 1 verður 4) orðað soleiðis: "4) Persónar, felløg, kommunur o.o., sum sambært kap. 5 hava fingið loyvi frá loftmiðlanevndini"
3) Í § 3 stk. 1 verður sett sum 2. pkt.: "Henda regla er ikki til hindurs fyri, at eigarafeløg o.l. senda út fráboðanir til íbúgvarnar í eigarafelagsumdøminum, sum snúgva seg um ymisk viðurskifti í grannalagnum"
4) § 4, 3) verður strikað.
5) Í § 5 stk. 1 verður skoytt uppí sum nýtt 3. pkt.: "§ 33 stk. 3-5 eru á sama hátt galdandi fyri útvarpið."
6) § 5 stk. 5, 2. pkt. verður strikað
7) Í § 6 stk. 3 verður sett aftarat sum 2. pkt.: "Tann, sum verður tilnevndur formaður, skal eisini verða formaður í teirri nevnd, sum sett verður sbr. § 18 stk. 3."
8) Í § 8 stk. 1 verður sett sum nýtt 3. pkt.: "Ongum húski kann verða álagt at rinda meiri enn eitt útvarpsgjald"
9) Í § 17 stk. 1 verður skoytt uppí sum nýtt 3. pkt.: "§ 33 stk. 3-5 eru á sama hátt galdandi fyri sjónvarpið."
10) Aftarat § 17 stk. 2, 3. pkt. verður sett: "tog málið er at 1. januar 2001 skal 1/3 av senditíðini verða føroysk framleiðsla."
11) § 17 stk. 5, 2. pkt. verður strikað.
12) Í § 18 stk. 3 verður sett aftarat sum 2. pkt.: "Tann, sum verður tilnevndur formaður, skal eisini verða formaður í teirri nevnd, sum sett verður sbr. § 6 stk. 3."
13) Í § 20 stk. 1 verður sett sum nýtt 3. pkt.: "Ongum húski kann verða álagt at rinda meiri enn eitt sjónvarpsgjald"
14) § 31 stk. 1. 2. pkt. verður orðað soleiðis: "Mannagongdin viðvíkjandi lýsingarvirksemi, ískoytisveitingum og eydnuspølum er hin sama, sum ásett er fyri sjónvarpið og útvarpið í kap. 3 og kap. 4 í hesi lóg."
15) Í § 32 stk. 1 verður sum nýtt 2. pkt. sett: "Landsstýrið kann veita loyvishavarunum undantak frá skyldini at goyma upptøkur av tilfari, sum longu frammanundan er tøkt á aðrari goymslu."
16) § 33 stk. 1 verður orðað soleiðis: "Loyvi til útvarp eftir § 29 er treytað av, at loyvishavarin sjálvur framleiðir sendingina ella keypir hana frá føroyskum framleiðara. Endurvarping av útlendskari sending í síni heild er ikki loyvd. Landsstýrismaðurin hevur heimild í serligum førum til at geva undantaksloyvi frá 1. og 2. pkt."
17) Í § 33 stk. 3 gongur út orðið "serliga".
18) § 37 stk. 2 verður orðað soleiðis: "Stk. 2 Avgerðir hjá loftmiðlanevndini kunnu innan 4 vikur eftir fráboðan kærast til landsstýrismannin."
19) Í § 44 stk. 1 verður "1. januar" broyttur til "1. mars."
20) Sum nýtt stk. 3 í § 44 verður sett: "Stk. 3. Kunngerð nr.1 frá 21. januar 1998 um sjónvarpsgjald og kunngerð nr. 2 frá 21. januar 1998 um útvarpsgjald hava framvegis gildi, til tær verða settar úr gildi av landsstýrismanninum."

Viðmerkingar

Viðv. 1) og 2) Broytingin er gjørd fyri at nágreiniliggera tekstin.

Viðv. 3) At senda ymsar fráboðanir v.m. út um kaðalnetið verður í dag gjørt í ymiskum byfingum í Havn. Nevndin heldur, at hetta framhaldandi skal verða loyvt, og mælir tí til, at hetta verður sett í lógina.

Viðvíkjandi 4) Ásetanir viðvíkjandi dekoting og gjøldum o. ø. er ein upphavsrættarligur spurningur, sum ikki náttúrliga hoyrir heima í lógini um kringvarp. Hetta eru spurningar, sum mugu loysast sbr. upphavsrættarlógini millum tann, sum sendir, og tann, sum eigur upphavsrættindini, møguliga við rættarmáli. Landsstýrismaðurin í viðkomandi málsøki eigur ikki at hava nakrar heimildir í hesum sambandi.

Viðvíkjandi 5) Einsljóðandi reglur eiga at verða fyri almennu miðlarnar og tær privatu sendistøðirnar.

Viðvikjandi 6) Nevndin heldur ikki, at heimild skal verða til, at útvarpið setir á stovn vinnufeløg av nøkrum slagi, og skjýtur tí upp, at henda heimild verður strikað. Broytingin fordar ikki útvarpinum at selja egna framleiðslu.

Viðvíkjandi 7) Útvarp og sjónvarp mugu samskipast sera neyvt, og tí verður skotið upp, at útvarps- og sjónvarpsnevndarformaðurin er hin sami(a).

Viðvíkjandi 8) Nevndin er av teirri áskoðan, at lógatryggjað eigur at verða, at hvørt húski bara rindar eitt útvarpsgjald, heruppí fyri luntitól í bili og báti.

Viðvíkjandi 9) Víst verður til 5)

Viðvíkjandi 10) Føroyska tilfarið eigur at økjast, og sett verður sum mál, at ár 2001 skal føroyska framleiðslan verða komin uppá 1/3 av tí, sum sent verður.

Viðvíkjandi 11) Víst verður til 6)

Viðvíkjandi 12) Víst verður til 7)

Viðvíkjandi 13) Víst verður til 8)

Viðvíkjandi 14) Broytingin er gjørd fyri at gera tað eitt sindur greiðari, at reglurnar fyri háttinum at fáa peningin inn eru tær somu, sum fyri almennu miðlarnar, men peningurin fellur til avvurðandi kringvarpsstøð.

Viðvíkjandi 15) Eingin orsøk er fyri at goyma t.d. tónleik, sum verður spældur frá einum løguspælara. Bert eginframleiðslan skal goymast, og slíkt tilfar, sum kringvarpsstøðin ikki kann fáa til vega frá øðrum, um almennir myndugleikar biðja um avrit av tí, sum sent er.

Viðvíkjandi 16) Nevndin heldur ikki, at tað er nøkur gongd leið, at kringvarpssendingar verða gjørdar á tann hátt, at sendingar verða keyptar uttanlendis, og at hetta tilfar so at siga bara verður endursent í Føroyum á fremmandum máli. Tilfarið eigur at vera føroyskt. Hinvegin eigur tað ikki at vera forboð fyri at endurgeva ein part av útlendskum tilfari, tá ið tað náttúrliga fellur inn í eina annars føroyska sending. Nevndin skjýtur tí upp hesa broyting til § 33. Hugsast kann, at undantaksloyvi verður givið útlendingum í Føroyum at gera sendingar á móðurmálinum. Somuleiðis kann hugsast, at serligar sendingar uttanfrá kunnu sam- ella endursendast.

Viðvíkjandi 17) Broytingin er gjørd fyri at einfaldgera tekstin.

Viðvíkjandi 18) Kærumøguleiki má verða fyri avgerðum loftmiðlanevndarinnar, og mælt verður til, at slík mál kunnu skjótast inn fyri landsstýrið.

Viðvíkjandi 19) og 20) Reglurnar eru neyðugar skiftisreglur.

2. viðgerð fríggjadagin 13. februar 1998. Broytingaruppskot frá mentamannevndini til §§ 1,3, 4, 5, 6, 8, 17, 18, 20, 31, 32, 33, 37 og 44 samtykt 28-2-0. §§ 1,3, 4, 5, 6, 8, 17, 18, 20, 31, 32, 33, 37 og 44 soleiðis broyttar samtykt 28-2-0. §§ 2, 7, 9, 10, 11, 12, 13, 14, 15, 16, 19, 21, 22, 23, 24, 25, 26, 27, 28, 29, 30, 34, 35, 36, 38, 39, 40, 41, 42 og 43 samtyktar 28-2-0. At uppskrivið soleiðis samtykt kann fara til 3. viðgerð samtykt 28-2-0.

3. viðgerð týsdagin 17. februar 1998. Uppskrivið sum samtykt við 2. viðgerð endaliga samtykt 25-2-0.

Løgtingslóg nr. 22 frá 20.02.1998

F.L.j.nr. 2297-2/97

24 Broyting í lóg "om jordbrugets fremme"

Ár 1997, týsdagin 18. november, legði, Jákup Olsen, løgtingsmaður, vegna seg sjálvan og løgtingsmenninar Jákup Joensen, Henrik Old, Ingeborg Vinther, Jóannes Eidesgaard, Heina O. Heinesen, Helenu Dam á Neystabø, Óla Jacobsen, Jenis av Rana og Óla Breckman fram soljóðandi:

U p p s k o t
til
løgtingslóg um broyting í lóg "om jordbrugets fremme"

§ 1.

Í lóg nr. 174 frá 24. mai 1937 fyri Færøerne om jordbrugets fremme við seinni broytingum verða gjørdar hesar broytingar:

1) § 40, nr. 10 verður orðað soleiðis: "tøingarvirkir".

2) § 40, nr. 10 verður nr. 11.

§ 2.

Henda lóg kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

Viðmerkingar:

Endamálið við uppskotinum er at bøta um møguleikan at gagnnýta føroysku ullina, sum undir verandi umstøðum í stóran mun fer fyri skeyti og er mest sum ein umhvørvistrupulleiki.

Orsøkin er einfalt tørvandi lønsemi í framleiðsluni, og uppskotið miðjar í móti betri liggjarmøguleikum av virkseminum og harvið menning av hesum iðnaði serliga í útjaðaraøkjum.

1. viðgerð 26. november 1997. Uppskotið verð beint í vinnunevndina, sum 8. desember 1997 legði fram soljóðandi:

Á l i t

Málið er lagt fram av 10 tingmonnum tann 18. november 1997 og er eftir 1. viðgerð tann 26. november 1997 beint í vinnunevndina.

Vinnunevndin hevur viðgjørt málið og hevur undir viðgerðini havt fund við Ivan Johannesen, landsstýrismann, Mariu Róin, fulltrúa, og Føroya Jarðarráð.

Undir viðgerðini er komið fram, at Jarðarráðið hevur fingið onkra umsókn um lán í sambandi við viðgerð av ull, men at Jarðarráðið ikki hevur heimild at viðgera slíka, og er henda umsókn tí slettis ikki viðgjørd. Ráðið er tó av teirri fatan, at sera lítið av føroysku ullini kemur til høldar, og at tað tí átti at verið heimild hjá ráðnum at veita lán til henda partin av landbúnaðinum. Jarðarráðið hevur tí vent sær til landsstýrið um at fáa hesa heimild.

Undir viðgerðini hevur nevndin býtt seg í ein meirluta og ein minniluta.

Meirlutin (Jørgen Niclasen, Henrik Old, Heini O Heinesen, Óli Jacobsen, Lasse Klein og Álvur Zachariasen) mælir løgtinginum til at samtykkja uppskotið.

Minnilutin (Bjørn á Heygum) hevur hesar viðmerkingar:

Skotið verður upp at víðka heimildina í lógini til at veita bílig almenn lán úr jarðargrunninum til eisini at fevna um sonevnd tøtingarvirkir.

Lánini úr jarðargrunninum kosta í løtuni 3% í rentu og verða vanliga afturgoldin yvir eitt rættiliga langt áramál, sum liggur millum 20 - 40 ár.

Sostatt verður miðað ímóti at veita tøtingarvirkjum lán, sum liggja 5 - 6% undir galdandi marknaðarprísi.

Hesin sonevndi kunstigi tilboðsprísur uppá pening má neyðturviliga verða fíggjaður yvir skatt ella avgjald umvegis studning á fíggjarlógini.

Tv.s. lánini eru fyri tað fyrsta medvirkandi til at tyngja um skatta- og avgjaldstrýstið í Føroyum, sum frammanundan er alt ov høgt.

Sum støðan á marknaðinum er í dag verður annars ikki mett, at tørvur er á eini serskipan við almennum stuðli umvegis jarðargrunnin til ullavirking í Føroyum.

Vit hava frammanundan nøkur ullavirkir, sum virka undir vanligum marknaðartreytum.

Hesi virka bert ta ull, sum tað reint peningaliga loysir seg at framleiða undir verandi fyritreytum. Sostatt er framleiðsluorkan lagað til løgsemi í vinnuni uppá galdandi marknaðarkor.

Um almennur studningur verður veittur nýggjum virkjum, fer hetta fyri tað fyrsta at avlaga kappingina.

Hetta ber í sær, at verandi virkir fáa ilt við at reka fønandi virksemi, tá vandi verður fyri undirbjóðing við almennum stuðli.

Í seinasta enda gerast hini virkini eisini heft av almennum stuðli, um tey skulu klára seg í kappingini.

Á henda hátt verður eitt slíkt lógaruppskot medvirkandi til, at øll vinnan meir ella minni verður trýst til at søkja um hesi somu bíligu lánini fyri at gerast javnstillaði við nýggju virkini.

Vit koma harvið inn á eina ónda ringrás, har øll vinnan at enda má dúva uppá almennan studning fyri at yvirliva.

Uppskotið, sum er lagt fram, er somuleiðis serstakliga ætlað einum aktuellum máli um lánitørv hjá einstøkum virki, sum hevur søkt jarðargrunnin um fíggjing.

Uppskotið byggir harvið ikki á ein sakligan tørv, men heldur uppá nøkt av vinnuligum og politiskum seráhugamálum.

Hetta kann undir ongum umstøðum vera ætlanin fyri framtíðar vinnupolitikki í Føroyum, og tekur minnilutin Bjørn á Heygum tískil ikki undir við uppskotinum.

2. viðgerð 15. december 1997. §§ 1 og 2 samtykkur 26-1-2. At uppskotið soleiðis samtykt kann fara til 3. viðgerð, samtykt 27-1-1.

3. viðgerð 18. december 1997. Uppskotið, sum samtykt við 2. viðgerð, endaliga samtykt 17-2-1.

Løgtingslóg nr. 160 frá 19. december 1997.

25 Uppskot til løgtingslóg um ávís tiltøk samsvarandi sáttmála Sameindu Tjóða

Ár 1997, týsdagin 25. november, legði Edmund Joensen, løgmaður vegna landsstýrið fram soljóðandi:

Uppskot
til
løgtingslóg um ávís tiltøk samsvarandi sáttmála Sameindu Tjóða

§ 1. Landsstýrið kann í kunngerð áseta slík tiltøk, sum Føroyar eftir sáttmála Sameindu Tjóða hava skyldu til at seta í verk fyri at fremja samtyktir, ið tiknar eru av trygdarráðnum samsvarandi artikul 41, smbr. 39, í kapittli VII í sáttmálanum.

Stk. 2. Í tílíkum kunngerðum kunnu ásetast reglur um, at brot á kunngerðirnar kann revsast eftir § 110 c, stk. 2 í borgarligu revsilógini, eins og at hald kann leggjast á vinning. Er brotið framt av einum løgfrøðiligum persóni, kann verða álagt løgfrøðiliga persóninum sum slíkum bót.

Stk. 3. Ásetingarnar í stk. 1 kunnu fevna um ríkisborgarar búsettir í Føroyum, hóast staddir eru uttanlands.

§ 2. Henda lóg kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd. Samstundis fer úr gildi løgtingslóg nr. 60 frá 26. mars 1993 um forboð móti handli v.m. við Serbia og Montenegro og løgtingslóg nr. 16 frá 27. januar 1994 um forboð móti handli v.m. við Irak.

Viðmerkingar

Trygdarráðið hjá ST samtykkir í mongum førum at áleggja limalondunum at seta tiltøk í verk móti ávísum londum.

Um talan er um felagsmál, hevur stjórnin standandi heimild eftir lóg nr. 156 frá 10. mai 1967 við seinni broyting "om visse forhold i henhold til De Forenede Nationers pagt" í kunngerð at seta tiltøkini í verk eisini galdandi fyri Føroyar, aftaná ummæli frá landsstýrinum.

Er talan um at seta ST-tiltøk í verk á økjum, ið eru yvirtikin sum sermál, t.d. handilsforboð, er neyðugt við serstakari løgtingslóg, og sum dømir kunnu nevnast løgtingslógirnar um forboð móti handli við Suðurafrika, Irak og Serbia.

Tá tað ofta kann hava skund at seta tiltøk í verk sum ST-trygdarráðið hevur samtykt, t.d. um forboð móti handli við lond, sum eru í krígsstøðu, verður mælt til, at landsstýrið fær heimild til í kunngerð, at seta tiltøk í verk, sum ST hevur samtykt móti ávísum londum.

Vísandi til § 37, stk. 3 í tingskipanini verða ongar beinleiðis útreiðslur fyri landskassan av uppskotinum, men kunnu slík tiltøk hava við sær óbeinleiðis miss fyri føroyska samfelagið.

Viðmerkingar til tær einstøku greinarnar

Ad. § 1. Reglurnar í stk. 1 eru tær somu sum í lóg nr. 156 frá 10. mai 1967 við seinni broyting "om visse forholdsregler i henhold til De Forenede Nationers pagt", ið er lýst í Føroyum, og gevur heimild til at seta tiltøk í verk á ikki yvirtiknum økjum. Kunngerðirnar kunnu verða givnar av tí landsstýrismanni, sum løgmaður hevur latið økið at umsita eftir § 33 í stýrisskipanarlógini. Hetta vil vanliga vera landsstýrismaðurin, ið umsitur vinnumál.

Ad. § 2. Tilsvarandi lógin í Danmark um tiltøk móti fyrrverandi Jugoslavia er avtikin, og danska lógin um tiltøk móti Irak er munandi linkað, aftaná at løgtingslógin kom í gildi.

1. viðgerð 2. desember 1997. Uppskotið verður beint í útlendsnevndina, sum tann 16. januar 1998 legði fram soljóðandi:

Á l l t

Málið er lagt fram av landsstýrinum tann 25. november 1997 og er eftir 1. viðgerð tann 2. desember 1997 beint í uttanlandsnevndina.

Uttanlandsnevndin hevur viðgjørt málið og hevur tá støðu, at heimildin í uppskotinum er ov víð. Við stýrisskipanarlógini var ætlanin at býta fyrisiting og lóggávu sundur soleiðis, at løgtingið tekur sær av lóggávuni, meðan landsstýrið tekur sær av fyrisitingini, og at lóggávuheimild bara verður løgd landsstýrinum, har heilt serligar grundir eru til tess sbr. reglunum í stýrisskipanarlógini § 34.

Nevndin heldur ikki, at so serligar grundir eru at víkja frá hesi høvuðsreglu. Eru altjóða tiltøk bráðneyðug, so eru tær neyðugu heimildirnar til, at málið kann fáa sera skjóta viðgerð á tingi; eitt nú er heimild í tingskipanini § 85 at víkja frá øllum frestum í slíkum førum, tá ið tryggd og undømi landsins stendur í váða. Vísandi til hetta mælir samd nevnd løgtinginum frá at samtykkja uppskot landsstýrisins.

Nevndin gongur út frá, at landsstýrið leggur nýtt uppskot fyri løgtingið, um so er, at landsstýrið heldur fast um, at løgtingslóg nr. 60 frá 26. mars 1993 um forboð móti handli v.m. við Serbia og Montenegro og løgtingslóg nr. 16 frá 27. januar 1994 um forboð móti handli v.m. við Irak skulu takast av.

2. viðgerð 23. januar 1998. §§ 1 og 2 fullu 2-1-16. Uppskotið sostatt fallið.
F.L.j.nr. 19-3/93

26 Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um landsskatt og kommunuskatt

Ár 1997, týsdagin 2.desember, legði Anfinn Kallsberg, landsstýrismaður, vegna landsstýrið fram soljóðandi:

Uppskot
til
løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um landsskatt og kommunuskatt

§ 1.

Í løgtingslóg nr. 86 frá 1. september 1983 um landsskatt og kommunuskatt við seinni broytingum verða gjørdar hesar broytingar:

Kap. 1

1) Í § 1, stk. 1 verða gjørdar hesar broytingar:
Í nr. 2 verður "Føroya Landsstýri" broytt til: "Landsstýrismaðurin í skattamálum".
Í nr. 3 verður "Líkningarráð Føroya verður heimilað" broytt til: "Landsstýrismaðurin í skattamálum fær heimild til".
2) Í § 3 verða gjørdar hesar broytingar:
Í stk. 2, 3 og 4 verður "Landsstýrið" broytt til: "Landsstýrismaðurin í skattamálum".
3) § 4 verður orðað soleiðis:
"**§ 4.** Hjúnarfelagar verða hvør sær settir sjálvstøðugt í skatt av inntøkum sínum.
Stk. 2. Uppgerðin av skattskyldugu inntøkuni hjá hjúnafeløgum fer fram eftir teimum reglum, sum ásettar eru í hesi lóg fyri uppgerð av skattskyldugu inntøkuni. Reka hjúnafelagar í felag sjálvstøðugt vinnuvirki, skal úrslitið av vinnuvirkinum takast við í uppgerðina í skattskyldugu inntøkuni hjá hjúnunum í mun til lutføllini teirra í rakstrinum. Er annar hjúnafelagin í starvi hjá hinum hjúnafelagnum verður frádráttur fyri lønarútreiðslur bert góðkendur í tann mun samsýningin svarar til veruligu arbeiðsavrikið. Um hjúnini hava skattskyldugar inntøkur, ið stavar frá ognum í hjúnabandinum, skal hvør teirra taka við í skattskyldugu inntøkuuppgerðina tað inntøkuslag, ið stavar frá egnum ognum.
Stk. 3. Í teimum í stk. 2 nevndu førum verður landsstýrismaðurin í skattamálum heimilaður til við kunngerð at fyriskriva nøkvari reglur fyri, hvussu uppgerðin av skattskyldugu inntøkuni hjá sambúgvandi hjúnafeløgum, sum báðir eru skattskyldugir eftir § 1, skal verða framd.
Stk. 4. Í sambandi við sundurlesing ella skilnað millum sambúgvandi hjúnafelagar verður sambúgvið skattliga mett sum uppathildið samstundis sum sundurlesing ella skilnaður fer fram.

Stk. 5. Tá ið hjún slíta sambúð sína uttan at talan er um sundurlesing ella skilnað, verður sambúgvið skattliga mett sum uppathildið við endan á tí inntøkuári, tá ið sambúgvið heilt uppat.

Stk. 6. Tá ið hjún eftir at hava slitið sambúgv gerast sambúgvandi aftur, verða tey frá somu stund eisini skattliga mett sum sambúgvandi.

Stk. 7. Um skattskyldan eftir § 1 fellur burtur hjá tí eina ella báðum hjúnafelagunum, verður sambúgvið skattligа metn sum uppathildið, tá ið skattskyldan fellur burtur".

4) § 5, stk. 3 verður orðað soleiðis:

"*Stk. 3.* Tá inntøkan hjá børnum, ið búgva heima og sjálv eru skattskyldug, verður mett til skatt, verður ikki talt upp í tað, sum tey fáa til uppihald, heilt ella lutvís frá foreldrunum, uttan so at hetta er viðurlag fyri starv í virki foreldranna ella vinnu, og tað tí er drigið frá skattskyldugu inntøku teirra".

Kap. 2

5) Stk. 2 í § 6 verður strikað.

6) § 9 verður strikað.

7) § 10 verður strikað.

8) § 12 verður strikað.

9) § 13 verður orðað soleiðis:

"**§ 13.** Doyr giftur persónur, og velur eftirsitandi hjúnafelagið í beinleiðis sambandi við andlátið at sita í óskiftum búgvi við felagshúnum, verður eftirsitandi hjúnafelagin at seta í skatt av allari inntøku hjúnanna í tí inntøkuári andlátið var.

Stk. 2. Gjørd verður ein álíkning av inntøkunni hjá tí deyða og ein av inntøkuni hjá tí eftirsitandi hjúnafelagnum fyri hetta inntøkuár.

Stk. 3. Eftirsitandi hjúnafelagin kemur skattliga fult og heilt í stað hins deyða".

10) Í § 14 verða gjørdar hesar broytingar:

Í stk. 2 verður "skattavaldið" broytt til: "líkningarvaldið".

Í stk. 3 verður "skattavaldið" broytt til: "líkningarvaldið" og "Líkningarráðnum" broytt til: "líkningarvaldinum."

Í stk. 4 verður "skattamyndugleikunum broytt til: "líkningarmyndugleikunum".

Í stk. 5, 1. pkt. verður "skattavaldsins" broytt til: "líkningarvaldsins". Í 2. pkt. verður "skattavaldinum" broytt til: "líkningarvaldinum", og í 3. pkt. verður "skattavaldið" broytt til: "líkningarvaldið".

Í stk. 7 verður "Líkningarráð Føroya" broytt til: "Landsstýrismaðurin í skattamálum".

11) Í § 15, stk. 2 verður "skattavaldinum" broytt til: "líkningarvaldinum".

12) Í § 18, stk. 1 verður "Líkningarráð Føroya" broytt til: "Landsstýrismaðurin í skattamálum".

13) Í § 20 verður "Landsstýrið" broytt til: "Landsstýrismaðurin í skattamálum" og "skattavaldið" broytt til: "líkningarvaldið".

14) Í § 21 verða gjordar hesar broytingar í stk. 2:

Í 3. pkt. verður "líkningarráðnum" broytt til: "líkningarvaldinum".

Í 4. og 5. pkt. verður "líkningarráðið" broytt til: "líkningarvaldið".

Kap. 3

15) Í § 24, stk. 3 verður "líkningarráðnum" broytt til: "landsstýrismannunum í skattamálum".

Sum nýtt stk. verður sett:

"*Stk. 4.* Landsstýrismaðurin kann heimilað líkningarvaldinum at taka avgerð í málum um broytt inntøkuár."

16) Eftir § 25 verður sum nýggj grein sett:

"**§ 25a.** Fyri skattskyldugа inntøku um borð á fiskiskipi/útróðrarbáti verður roknað øll veiðiinntøka løgd inn í peningi ella peningsvirði. Bjargingarløn, løn fyri sleip og annað, sum ognast bátinum á veiðuferð, ella tá farið verður til hjálpar, kemur eisini undir reglurnar í hesi lóg.

Stk. 2. Fyri skattskyldugа inntøka umborð á útróðrarbáti verður eisini roknað veiðiinntøka fyri heimaegning, sum verður latin til í mesta lagi tveir av fastu manningini á jevnum føti við teir, sum eru úti við bátinum. Øll onnur inntøka herundir egning, sum serlig samsýning verður latin fyri, inntøka av at gera nýggja útgerð til bátin, hjálp til at rekja bátin o.a.m., og vinningur av skiparaksari gjørdur upp eftir hesi lóg, verður roknað sum inntøka á landi og ikki sum veiðiinntøka.

Stk. 3. Tá veiðiinntøkan o.a.m. sambært hesi grein, sum skal avroknast manningini eftir hesari lóg, verður gjørd upp, eru hesar treytir galdandi:

1) Manningin er mynstrað eftir sáttmála millum Føroya Reiðarafelag og viðkomandi yrkisfelag, ella millum Meginfelag Útróðrarmanna og Báta- og Skipaeigarar.

2) Har eingin sáttmáli er, er treytin, at mynstrað verður, ella at hýra verður avtalað, eftir sáttmála millum viðkomandi reiðara ella skipaeigara og viðkomandi persón ella yrkisfelag.

Stk. 4. Tann sáttmáli ella avtala, sum umrødd er undir stk. 3, skal sum minsta mark lúka hesi krov:

1) Av bruttoveiðuni gongur beinleiðis sølufrá reiðsla, ags. heimaegning sbrb. stk. 2, olja,upp til 1/5 og 1/4 fiskipart til mogulgan kokk og annað, sum kann verða avtalað í sáttmála millum manning og eigara.

2) Av nettoveiðini uppgjørd sambært 1) fær manningin hægst 45% + frítíðarløn av

einum fiskiparti. Umfram fiskipartin kann eigarin sjálvur rinda samanlagt upp til 10% av nettoveiðini til skipara, motorpassara og bestamarn.

Stk. 5. Um tann, ið er við føroyskum fiskiskipi, eigur part í skipinum, verður hert tann parturin av inntøkuni, sum er gjørd upp sambært reglurnar í stk. 3 og 4 og sum er sami uppgerðarháttur, sum hjá hinum av manningini, roknað sum A-inntøka sambært § 60, stk. 1, nr. 9).

Stk. 6. Hjá fiskimonnum, sum eru skattskyldugir í Føroyum sambært § 1 í hesu lóg, og sum eru mynstraðir við fiskiskipum, sum ikki eru skrásett í Føroyum, og sum har fáa hýru sambært sáttmála, verður hýran lækkað, smb. § 60, stk. 1, nr. 9), áðrenn skattur verður álagdur sambæn skattalógini".

Stk. 7. Hýra frá skipum undir Føroysku Altjóða Skipaskránni verður skattliga viðgjørd eins og veiðuinntøka."

17) Eftir § 25 a verður sum nýggj grein sett:

"**§ 25b.** Fyri skattskylduga inntøku um borð á útlendskum skipum, sum hert verða nýtt til vinnuliga flyting av persónum og/ella góðsi millum føroyska og útlendska havn og millum útlendskar havnir, herundir skip sum verða nýtt sum bjargingarskip og ikki eru heimahoyrandi í Føroyum, og fyri tænastu umborð á útlendskum skipum og øðrum útbúnaði, sum verður nýttur í samband við rannsókn og úttøku av kolvetni uttan fyri føroyskt sjóøki, verður roknað alt tað sum hin skattskyldugi í inntøkuárinum hevur lagt inn í peningi ella peningsvirði. Herundir kemur eisini hýra fyri tænastu umborð í tíðini skipið verður umvelt ella er fyribils upplagt og hýra sum persónur fáa umborð á skipi, teir eru partreiðarar í.

Stk. 2. Manningin á skipum, sum ero skrásett í Føroysku Altjóða Skipaskránni FAS ella í Donsku Altjóða Skipaskránni DIS og í føroysku skipaskrásetingini annars, koma ikki undir reglurnar í stk. 1."

18) Í § 26, stk. 3 verður "Líkningarráðið" broytt til: " Landsstýrimaðurin í skattamálum".

19) Í § 28, stk. 4, 1. pkt. verður "Líkningarráðið" broytt til: "Landsstýrismaðurin í skattamálum", og í 2. pkt. verður aftan á "fyri frítíðarløn", skoyti upp í: "sum landsstýrismaðurin í skattamálum ásetir í kunngerð".

20) § 29, nr. 3) verður orðað soleiðis:

"3) gávur sum hin skattskyldugi hevur fingið frá hjúnafelaga, avkomið, foreldrum (heruppí í eisini ættleiðingarforeldrum) ella abba ella ommu, samanber tó § 5, stk. 4 og 5 í hesi løgtingslóg, somuleiðis ognarvøkstur, sum stavar frá arvi og greiðslu frammanundan burturav arvi falnum ella ófalnum, ella av tí at eftirsitandi hjúnafelagin tekur við felagsbúgvi til at sita í óskiftum búgvi".

21) Í § 29a verða gjørdar hesar broytingar:

Í stk. 3 verður "Føroya Landsstýri" broytt til: "Landsstýrismaðurin í skattamálum".

Í stk. 4 verður "Landsstýrið" broytt til: "Landsstýrismaðurin í skattamálum".

22) Í § 31 verða gjørdar hesar broytingar:

Í stk. 3 verður "Landsstýrið" broytt til: "Landsstýrismaðurin í skattamálum".

Stk. 6 verður orðað soleiðis:

"*Stk. 6.* Tá skattliga eginnýtslan hjá hjúnum verður gjørd upp, verður inntøkan hjá hjúnunum fyri alt inntøkuárið og oga og skuld við ársbyrjan og enda tikin við".

23) Í § 33 verða gjørdar hesar broytingar:

Í nr. 1) og nr. 3) verður "Landsstýrið" broytt til: "Landsstýrismaðurin í skattamálum".

Í nr. 9) verður "Landsstýrið ásetir" broytt til: "Landsstýrismaðurin í skattamálum ásetir".

Í nr. 10) verður "Líkningarráð Føroya" broytt til: "Landsstýrismanninum í skattamálum".

Nr. 12) verður orðað soleiðis:

"12) Partur av meirútreiðslum til kost, húsaleigu, ferða- og flutningsútreiðslum, meirútreiðslum til sjúkra og vanhukkutryggingar, ið skattgjaldari hevur vegna inntøkugevnadi arbeiði í útlondum ella umborð á útlendskum skipi. Frádrátturin er treytaður av, at dvølurin uttanlands er vegna arbeiði, og at dvølurin uttanlands innan fyri eitt 12 mánaða tíðarskeið antin er 2 mánaðir uttan slit, ella í minsta lagi 100 samdøgur innan fyri eitt 12 mánaðar tíðarskeið. Landsstýrismaðurin í skattamálum ásetir við kunngerð frádráttaruppheddina og øeyvari reglur fyri, hvussu frádrátturin verður veittur. Frádráttirnir eftir hesum reglum kunnu tilsamans ongantíð verða størri enn skattskylduga uttanlandsinntøkan."

Sum nr. 13) verður sett:

"13) Fyri persónar, sum eru umfataðir av § 25b, stk. 1 og sum hava fingið hýru v.m. frá útlendskum skipum v.m. umrødd í § 25b, stk. 1 kunnu tá skattskylduga inntøkan verður gjørd upp lækka hana við einari upphædd upp á kr. 50.000. Hartil kann hon lækkast við 15% av hýruinntøkuni upp til kr. 200.000 og við 8% av restini upp til kr. 350.000. Frádrátturin verður roknaður av hýruni umroknað til heilársinntøku, og kann fyri hvørt inntøkuár hægst verða roknaður av einari heilársinntøku upp á kr. 350.000. Hevur ein persónur hýru v.m., sum kemur undir hesa skipan, hert ein part av inntøkuárinum, verður fasti frádrátturin og prosentfrádrátturin lækkaðir lutfalsliga".

24) Í § 34 verður stk. 1 strikað.
Stk. 2, 3, 4 og 5 verða eftir hetta stk. 1, 2, 3 og 4.
Í stk. 5, sum verður stk. 4, verður "3. stk." broytt til: "stk. 2."

25) Í § 39 verður pkt. 2 strikað.

Kap. 4

26) Í § 41 verða gjørdar hesar broytingar:
Í stk. 2 verður "1. oktober" broytt til: "1. desember".
Í stk. 4 og 5 verður "landsstýrið" broytt til: "landsstýrismaðurin í skattamálum".

27) Í § 43 verða í stk. 1 gjørdar hesar broytingar:
"1. oktober" verður broytt til: "1. desember", aftan á "1.mai árið eftir" verður sett: "til tað kommunu, sum hevur fingið skattin", "leggjast fyri landsstýrið" verður broytt til: "leggjast fyri landsstýrismannin í skattamálum" og "úrskurð landsstýrisins" verður broytt til: "úrskurð landsstýrismansins í skattamálum".

28) Í § 43, stk. 2 verður "1. oktober" broytt til: "1. desember".

29) Í § 45, stk. 1 verður "Líkningarráðið" tvær ferðir broytt til: "landsstýrismaðurin í skattamálum".

30) Í § 47, stk. 1 verður "í seinnu helvt av september mánaði" broytt til: "í seinasta lagi 1. desember".

Kap. 5

31) Í § 50 verður stk. 1 orðað soleiðis:
"Tetr í § 48 nevndu persónar v.m., sum koma undir reglurnar í hesum kapitli, skulu tá fyribils-skattaskráseting og endaligt álíkning verða gjørd, lata inn uppgerð til líkningarvaldið í økinum hjá tilhalds-/skrásetingarkommununi yvir allar inntøkur og útreiðslur, uttan tann tit um tær stava frá vinnu í atvinnu- ella tilhaldskommunu, og skal uppgerðin verða lagað soleiðis, at skilliga sæst, hvussu inntøkur og útreiðslur eru uppgjørdar, og hvussu tær býta seg millum atvinnu- og tilhaldskommunu".

32) Í § 50 verður stk. 2 orðað soleiðis:
"*Stk. 2.* Økisskrivstovan hjá tilhaldskommununi letur beinanveg eitt eintak av uppgerðini, ið viðvíkur atvinnuinntøkuni, saman við møguligum roknskapi og øðrum skjølum, sum tey hava samband við atvinnuinntøkuna, til líkningarvaldið í tí øki viðkomandi er atvinnuskattskyldugur.".

32a) Í § 51, stk. 1 verður "Líkningarvaldið í atvinnukommununi" broytt til: "Líkningarvaldið hjá atvinnukommununi".

33) Í § 51, stk. 3 verður "Líkningarvaldið í atvinnukommununi" broytt til: "Líkningarvaldið hjá atvinnukommununi", og "tilhaldskommonuni" verður broytt til: "líkningarvaldinum hjá tilhaldskommununi".

34) 51. stk. 4 verður orðað soleiðis:
"*Stk. 4.* Rættin til at skattleggja tey í § 48 nevndu felog v.m., eigur økið hjá tilhalds/skrásetingarkommununi. Av tí kommunuskatti, sum verður álíknaður eftir 1. pkt. av samløgdu inntøkum felagsins v.m., eigur atvinnukommunan so stóran part, sum fellur á ta inntøku, sum vunnin er í atvinnukommununni, og verður hann goldin saman við skattinum til heimstaðarkommununa, smb. reglunum í § 21, stk. 1.".

35) Í § 53 verður "atvinnu kommununi" broytt til: "atvinnukommununi".

Kap. 6

36) Í § 56 verður "Landsstýrið" broytt til: "landsstýrismaðurin í skattamálum".

37) Í § 59 verður "1. oktober" broytt til: "1. desember", og "landsstýrið" broytt til: "landsstýrismaðurin í skattamálum"

38) Í § 60 verða gjørdar hesar broytingar:
Í stk. 1 verður sum nr. 9) sett:
Fiskipartar o.a.m. gjørdir upp sambært § 25a, stk. 3-7, tá hesir eru lækkaðir við 15 %".
Í stk. 2 verður "líkningarráðnum" broytt til: "landsstýrismannin í skattamálum".

39) Í § 62, stk. 1 verður "Líkningarráðið" broytt til: "landsstýrismaðurin í skattamálum", og "líkningarráðsins" broytt til: "landsstýrismansins í skattamálum".
Í stk. 2 verður "líkningarráðið" broytt til: "Toll- og Skattaráðið" og "líkningarráðsins" broytt til: "Toll- og Skattaráðsins".

40) Í § 63 verða gjørdar hesar broytingar:
Í stk. 1 verður "Landsstýrið" broytt til: "landsstýrismaðurin í skattamálum".
Í stk. 2 verður "Líkningarráðið" broytt til: "Landsstýrismaðurin í skattamálum)", og eftir pkt. 3 verður sum 4. pkt. sett: "Tá A-inntøka sambært § 60, stk. 1, nr. 9) verður goldin skattgjaldara skulu saman við henni verða goldin tey 15% av býrunt, sum ikki verða roknað sum A-inntøka. Landsstýrismaðurin í skattamálum ásetir nærri reglur um avroknингarháttin."
Í stk. 3 verður "landsstýrinum" broytt til: "landsstýrismannunum í skattamálum", og "Líkningarráðið" broytt til: "Landsstýrismaðurin í skattamálum".
Í stk. 4 verður "Líkningarráð Føroya" broytt til: "Líkningarvaldið", og sum nýtt 3. punktum verður sett: "Landsstýrismaðurin í skattamálum kann við kunngerð ásetа krov til skjalprógv, ið kunnu sanna, hvør persónurin er og í hvørjum førum hann kann sleppa undan at skráseta seg sambært 1. pkt.".

Í stk. 5 verður "Skattavaldið" broytt til: "Líkningarvaldið".

41) Í § 63a verða gjørdar hesar broytingar:
Í stk. 2, 1. pkt verður "Líkningarráð Føroya" broytt til: "líkningarvaldið".
Í stk. 3 verður "Føroya Landsstýri" broytt til: "Landsstýrismaðurin í skattamálum".
Í stk. 4 verður "Líkningarráð Føroya" broytt til: "Landsstýrismaðurin í skattamálum".

42) Í § 66 verður "Landsstýrið" broytt til: "Landsstýrismaðurin í skattamálum".

43) Í § 67 verða gjørdar hesar broytingar:
Stk. 2 verður strikað.
Stk. 3, 4 og 5 verða hereftir stk. 2, 3 og 4.
Í stk. 3, sum verður stk. 2, verður "Líkningarráðið" broytt til: "Toll- og Skattaráðið".
Í stk. 4, sum verður stk. 3, verður "Líkningarráðið" broytt til: "Landsstýrismaðurin í skattamálum".
Í stk. 5, sum verður stk. 4, verður "líkningarmyndugleikarnir hava" broytt til: "líkningarvaldið hevur".

44) Í § 68 verður "Landsstýrið" broytt til: "Landsstýrismaðurin í skattamálum".

45) Í § 69, stk. 1 verður "Landsstýrið" broytt til: "Landsstýrismaðurin í skattamálum".

46) Í § 70 verður "Líkningarráðið" broytt til: "Landsstýrismaðurin í skattamálum".

47) Í § 72, stk. 1 verður "skattavaldið" broytt til: "líkningarvaldið".

48) Í § 73 verður "líkningarráðið" broytt til: "landsstýrismaðurin í skattamálum".

49) Í § 77 verður stk. 3 orðað soleiðis:
"*Stk. 3.* Avloppsskattur, ið skattgjaldarin fær eftir § 79, verður mótroknaður í frestandi skatti skattgjaldarans hóast frestandi skatturin ikki er fallin til gjaldingar".

50) § 79, stk. 5 fellur burtur. Stk. 6 verður eftir hetta stk. 5.

51) § 80, stk. 4 verður strikað. Stk. 5 verður eftir hetta stk. 4.

52) § 80, stk. 6 verður strikað. Stk. 7 verður eftir hetta stk. 5.

53) Í § 82 verður "skattavaldið" broytt til: "líkningarvaldið"

54) Kapittlarnir 7, 8 og 9 verða settir úr gildi.

Kap. 10

55) Í § 100 verða gjørdar hesar broytingar:
Í stk. 2 verður "líkningarráðið" broytt til: "Toll- og Skattaráðið".
Stk. 3 verður orðað soleiðis:
"*Stk. 3.* Sjálvuppgávan fyri eitt inntøkuár skal latast inn til Toll- og Skattstovuna í seinasta lagi 15. mars árið eftir, sbr. tó § 101 stk. 2. Sjálvuppgávur frá deyðsbúgvum, felløgum, felagsskapum v.m. sbr. § 1, stk. 1, nr. 7-16 og § 2 skulu vera innlatnar í seinasta lagi 1. juni. Sjálvuppgávan er roknað fyri at vera innlatin rettstundis, tá ið hon í seinasta lagt nevnda dag er fingin Toll- og Skattstovuni ella latin í postin".
Stk. 4 verður orðað soleiðis:
"*Stk. 4.* Á sjálvuppgávuni skal vera tilskilað, hvussu stór inntøkan er í teimum ymisku høvuðsinntøkugreinunum, og annars skulu allar sundurliðingar verða gjørdar, sum landsstýrismaðurin í skattamálum fyriskipar eftir samráð við Toll- og Skattaráðið. Eisini inntøkur, sum ikki skulu roknast við í skattskyldugu inntøkuna, kunnu krevjast greiniliga tilskilaðar á sjálvuppgávuni. Skattskyldugir persónar, sum ikki hava skyldu at lata inn roknskap saman við sjálvuppgávuni, skulu í tann mun, Toll- og Skattaráðið heldur tað verða neyðugt, verða skyldugir at siga frá størri útveganum í sambandi við eginnýtsluna, herundir eisini løn til húshjálp við meira. Landsstýrismaðurin í skattamálum kann eisini í samband við sjálvuppgávuna gera av, at á sjálvuppgávuni skulu vera upplýsingar og sundurliðingar, sum kunnu hava týdning fyri fyribilsskattaskrásetingina fyri komandi ár."
Stk. 5 verður orðað soleiðis:
"*Stk. 5.* Sjálvuppgávan av ognin smb. § 110 skal vera innlatin til Toll- og Skattstovuna eftir somu reglum og við somu freistum, sum nevndar eru í stk. 3. Á ognaruppgerðini skal, umframt samantaldu eginognina, annaðhvørt ognin er verulig ella skuldhall er, vera tílík sundurliðing av ognum og skuldum, sum landsstýrismaðurin í skattamálum fyriskipar í samráð við Toll- og Skattaráðið."
Í stk. 6 verður "líkningarráðnum" broytt til: "líkningarvaldinum".

56) § 101 verður orðað soleiðis:
"**§ 101.** Oyðubløð við navni, bústaði og persónstali v.m. til sjálvuppgávur verða gjørd eftir skipan landsstýrismanstins í skattamálum í samráð við Toll- og Skattaráðið, og verða tey í góðari tíð, áðrenn tær í § 100, stk. 3 nevndu innlatingarfreistir, latin øllum, ið eru at rokna fyri skattskyldug. At skattgjaldari ikki fær oyðiblað til sjálvuppgávu sendandi, loysir hann ikki frá skyldu síni at lata inn sjálvuppgávu ella frá teim avleiðingum, ið standast av tí, at persónur letur ikki inn sjálvuppgávu.
Stk. 2. Skattskyldugur persónur, sum hevur tingið ársuppgerð frá skattavaldinum, áðrenn

freistin fyri at lata inn sjálvuppgávu er farin, kann lata verða við at lata inn sjálvuppgávu, um hann er sannførdur um, at teir av skattavaldinum nýttu upplýsingar, ið eru grundarlag undir ársuppgerðini, eru rættir og fullfíggjaðir, sbr. § 139 A.".

57) Í § 103 verða gjørdar hesar broytingar.

Í stk. 1 verður seinasta punktum orðað soleiðis:

"Landsstýrismaðurin í skattamálum kann eftir tilmæli frá Toll-og Skattaráðnum við kunngerð áseta nærri krøv til ta skattligu uppgerðina og tað skattliga roknskapargrundarlagið".

Í stk. 2 verður "Landsstýrið" broytt til: "Landsstýrismaðurin í skattamálum", og "Ilkningarráðnum" broytt til: "Toll - og Skattaráðnum".

Stk. 3 verður orðað soleiðis:

"*Stk. 3.* Um nú skattgjaldari, sum samhært tí, ið frammanfyri er ásett, hevur skyldu at lata inn rakstrarroknskap og fíggjarstøðu, ikki ger hetta, tá verður sjálvuppgáva hansara mett ógild, og hann verður at ganga undir tað, ið av hesum stendst viðvíkjandi skattseting og rætti til kæru. Ilkningarvaldið hevur umframt heimild til at seta freist, nær ið roknskapurin og sjálvuppgávan skal verða innsend, og heimild at leggja við 100 kr. í dagsekt frá tí degi, at freistin er útí og til tilfarið kemur inn. Sektin fellur til landskassan, og viðvíkjandi feløgum kann sektin verða løgd á stjórnar- og ella nevndarlimir.".

58) § 104 verður orðað soleiðis:

"**§ 104.** Um fullfíggjað sjálvuppgáva av inntøku ikki er innlatin rættstundis, eins og frammanfyri er ásett, verður skattaskylduga inntøkan sett til eina metta upphædd. Toll- og Skattaráðið verður heimilað at fyriseta neyvari reglur fyri metingum eftir hesi grein.

Stk. 2. Verður fullfíggjað sjálvuppgáva av inntøku ikki latin Ilkningarvaldinum rættstundis, men er innlatanin minni enn 7 dagar ov seint, verður samanlagdi inntøkuskatturin hækkaður við 2%. Er hon innlatanin 7 dagar ella meira ov seint, verður samanlagdi inntøkuskatturin hækkaður við 5%. Hækkingarnar eftir hesum stk. kunnu tó hægst verða 5.000 kr.".

Stk. 3. Tær avleiðingar, ið nevndar eru í hesi grein og § 119, og sum stattast av tí, ikki at lata inn sjálvuppgávu, ella av ikki rættstundis at lata inn sjálvuppgávu, roknskap ella roknskapartilfar, kann landsstýrismaðurin í skattamálum eftir tilmæli frá stýrinum lina ella heilt lata falla burtur, tá skattgjaldarin søkir um tað, og til undanførslu hevur grund, sum landsstýrismaðurin í skattamálum telir fullgóða.".

59) Í § 105 verður stk. 1 orðað soleiðis:

"Landsstýrismaðurin í skattamálum kann í samráð við Toll og Skattaráðið gera reglur um, at persónar, felløg og onnur, sum hava roknskaparskyldu, kunnu fáa freistina við at lata inn sjálvuppgávu longda. Tó ongantíð útum 15. august í álíkningarárinum".

Stk. 2 verður orðað soleiðis:

"*Stk.* 2. Økisskrivstovunum er heimilað, tá ið serligar grundir eru til tess, at leingja freistina, sum sambært stk. 1 er sett av landsstýrismanninum í skattamálum. Hendan freist kann tó ikki leingjast útum 15. august í álíkningarárinum.".

60) Í § 105 verður stk. 3 strikað:

61) §§ 106 og 107 verða strikaðar.

62) § 109 verður orðað soleiðis:

"**§ 109.** Sambúgvandi hjúnafelagar hava rætt til at gera seg kunnugan við sjálvuppgávuna og ognaruppgerðina hjá hvørjum øðrum, áðrenn tær verða latnar Ilkningarvaldinum. Eisini hevur Ilkningarvaldið skyldu til, um biðið verður um tað, at lata hjúnafelaga fáa upplýsingar um inntøkuna og skattaútrokningina hjá hinum hjúnafelagnum".

Kap. 11

63) § 110 verður orðað soleiðis:

"**§ 110.** Øll, sum eru undir skattskyldu til inntøkuskatt eftir hesi lóg, hava við teimum undantøkum og avmarkanum, ið sett eru niðanfyri, skyldu til at lata Toll- og Skattstovuni fullfíggjaða ognaruppgerð, sum er yvirlit yvir allar ognir og øll fíggjarlig rættindi við tilskilan av virðinum. Skattskyldugir persónar, ið ikki hava bókhalds- og roknskaparskyldu, kunnu lata verða við at lata inn ognaruppgerð, um so er, at tað í mun til seinast innlatnu ognaruppgerð ikki eru broytingar í árinum í ognum og rættindum. Landsstýrismaðurin í skattamálum kann í samráð við Toll- og Skattaráðið gera reglur fyri í hvønn mun skattskyldugur hóast broytingar í ognarviðurskiftunum kann lata verða við at lata inn ognaruppgerð. Skattskyldugur, ið eigur ognir uttanlands av slíkum slag, sum umrøddar eru í stk. 3, skal tó altíð lata inn ognaruppgerð.

Stk. 2. Reglurnar í stk. 1, 2. pkt. eru tó ikki galdandi fyri skattskyldugar persónar, sum á fyrsta sinni skulu lata inn ognaruppgerð.

Stk. 3. Ognir og rættindi umrødd í stk. 1 eru millum annað:

1) Fastognir (grundøki við húsum ella uttan), eins og hús á annara manna øki).
2) motorakfør, báitar, innbúgv og annað leysafe
3) vørur, ráevni, maskinur, innbúgv, innistøða og leysafe, ið nýtt er í vinnu,

4) peningur og peningagildi, útistandandi skuldir, skuldarbrøv, innlogn í banka, sparikassa ella aðrari peningarstovnan, partabrøv, lutaprógv og aðrir partar í felagum, somuleiðis lista- og frímerkjasøvn eins og skartgripir, tá ið virðið teirra eru meira enn 25.000 kr.

Stk. 4. Oyðubløð til tað í stk. 1 nevndu ognaruppgerð verða gjørd eftir skipan landsstýrismansins í skattamálum í samráð við Toll- og Skattaráðið.

Stk. 5. Til ogn í deyðsbúgvi, sum er tikið til almenna skiftisviðgerð her á landi, teljast allar ognir eftir hin deyða, sum verða tiknar til skifti. Til ognina verða ikki tald tey virðir, sum eru úthtaðið arvingunum frammanundan uppgerðardagnum. Er úttekt av arvaforskoti ella gávum tarin fram í deyðaárinum, skal hetta takast við í uppgerðina, men ikki teljast upp í ognina.

Stk. 6. Letur persónur ikki inn ognaruppgerð yvir ogn síni í rættari tíð, soleiðis sum fyriskipað er í § 100, stk. 5 og § 110, stk. 1, ger tað sjálvuppgávu hansara av inntøkuni til einkis, jbr. tó stk. 1, 2. pkt. Økisskrivstovurnar frenja tá skattseting eftir reglunum í § 104, stk. 1.

Stk. 7. Í teim førum, ið nevnd eru í stk. 1, 2. pkt., kunnu økisskrivstovurnar áleggja einum skattskyldugum at láta inn fullfíggjaða ognaruppgerð sambært stk. 1, 1. pkt., tá ið hetta verður hildið neyðugt fyri at fáa greiðu á serliga truplum og fløktum málum.

Stk. 8. Um persónur ikki letur inn ognaruppgerð fyri ogn sína, tá ið hann verður kravdur eftir hesi sambært reglunum í stk. 7 ger tað sjálvuppgávu hansara av inntøkuni til einkis. Økisskrivstovurnar kunnu tá frenja skattseting eftir reglunum í § 104, stk. 1.".

64) § 111 verður orðað soleiðis:

"**§ 111.** Landsstýrismaðurin í skattamálum ásetur við kunngerð, hvørjar reglur, farið skal verða eftir, tá meting av ognum, ið nevndar eru í § 110, stk. 3, nr. 1)-6) verður gjørd."

65) § 116 verður orðað soleiðis:

"**§ 116.** Ogn hjá børnum yngri enn 16 ár verður tald upp í ognaruppgerðina hjá tí av foreldrunum, sum hevur foreldramyndugleikan. Tá talan er um børn í hjúnalagi avgera foreldrini sjálvi hvør av teimum skal rokna ogn barnanna upp í ognaruppgerð sína.

Stk. 2. Sambúgvandi hjún taka hvør sær egnar ognir við á ognaruppgerð sína. Landsstýrismaðurin í skattamálum verður heimilaður við kunngerð at fyriskriva nærri reglur fyri, hvussu skattaliga ognarbýti skal verða gjørt hjá sambúgvandi hjúnum".

66) § 117 verður strikað.

Kap. 12

67) Í § 118 verða gjørdar hesar broytingar:

Í stk. 1, b) verður "líkningarráðnum" broytt til: "Toll- og Skattaráðnum".

Í stk. 5 verður "skattavaldið" broytt til: "líkningarvaldið".

Í stk. 7, 1. punktum verður "líkningarráðnum" broytt til: "Toll- og Skattaráðnum", og skoytt verður uppí 1. punktum: "góðkend av landsstýrismanninum í skattamálum".

Í stk. 7, 2. punktum verður "Líkningarráðið kann" broytt til: "Landsstýrismaðurin í skattamálum kann eftir tilmæli frá Toll- og Skattaráðnum í hesum sambandi krevja".

Í stk. 8 verður "Líkningarráðið kann" broytt til: "Landsstýrismaðurin í skattamálum kann eftir tilmæli frá Toll- og Skattaráðnum"

Sum stk. 9 verður sett:

"*Stk. 9.* Upplýsingatskyldugur, sum frá líkningarvaldinum móttekur yvirlit yvir upplýsingar nevndir í hesi grein, hevur ikki upplýsingarskyldu, um hann er sannførdur um, at teir av líkningarvaldinum nýttu upplýsingar eru rættir og fullgóðir, sbrb. § 141, stk. 1, nr. 3.".

68) Í § 119 verða gjørdar hesar broytingar:

Í stk. 1 verður "kann líkningarráðið" broytt til: "kann landsstýrismaðurin í skattamálum eftir tilmæli frá Toll- og Skattaráðnum kunngera reglur um at".

Í stk. 2 og 3 verður "Líkningarráðið" broytt til: "Líkningarvaldið".

Í stk. 4 verður "líkningarráðnum" broytt til: "líkningarvaldinum".

Í stk. 5 verður "Líkningarráðið" broytt til: "Líkningarvaldið".

69) Í § 120 verða gjørdar hesar broytingar:

Í stk. 1 verður "líkningarráðnum" broytt til: "líkningarvaldinum", "líkningarráðið" broytt til: "líkningarvaldið" og "landsstýrisins" broytt til: "landsstýrismannsins í skattamálum".

Í stk. 2 verður "líkningarráðnum" broytt til: "líkningarvaldinum".

Stk. 3 verður orðað soleiðis:

"*Stk. 3.* Verksmiðjueigarar, heilsulunnum, iðnaðarvirki, fiskavirki og onnur vinnurekandi skulu, tá tey verða kravd, geva líkningarvaldin-

um upplýsingar um viðurskift sínti við einstakar nevndar viðskiftamenn ella útvegamenn, tó einans viðvíkjandi handli við slíkum vørum, sum keyparin ella útvegamaðurin, ið spurt er um, selur ella framleiðir í vinnu ella virki sínum.".

Í stk. 4, 1. punktum verður "líkningarráðnum" broytt til: "líkningarvaldinum" og í 2. punktum verður "Líkningarráðið" broytt til: "Líkningarvaldið".

70) Í § 120 a verða gjørdar hesar broytingar:
Í stk. 1 verður "avgerð líkningarráðsins" broytt til: "avgerð landsstýrismansins í skattamálum".
Í stk. 2 verður "fyriskipan líkningarráðsins" broytt til: "fyriskipan landsstýrismansins í skattamálum".

71) Í § 120 h verða gjørdar hesar broytingar:
Í stk. 1, 4, 5 og 6 verður "Landsstýrið" broytt til: "landsstýrismaðurin í skattamálum".

72) Í § 120 e verða gjørdar hesar broytingar:
Í stk. 1, 1. punktum verður "Landsstýrisins" broytt til: "landsstýrismansins í skattamálum" og í 2. punktum verður "landsstýrið" broytt til: "landsstýrismaðurin í skattamálum".
Í stk. 2 verður "landsstýrið" broytt til: "landsstýrismaðurin í skattamálum".
Í stk. 4 verður "landsstýrinum" broytt til: "landsstýrismanninum í skattamálum".

73) Í § 120 d verður "líkningarráðið" broytt til: "líkningarvaldið".

74) Í § 120 e verða gjørdar hesar broytingar:
Í stk. 1 verður "Líkningarráðið" broytt til: "Líkningarvaldið" og "Landsstýrið" broytt til: "landsstýrismaðurin í skattamálum".
Í stk. 2 verður "Líkningarráðið" broytt til: "Toll- og Skattaráðið" og skoytt verður upp í setningin: ", sum landsstýrismaðurin í skattamálum skal góðkenna".

75) Í § 120 f, stk. 2 verður "líkningarmyndugleikunum broytt til: "líkningarvøldunum" og "Líkningarráðið" broytt til: "Líkningarvaldið".

76) Í § 120 g, stk. 2 verður "landsstýrinum" broytt til: "landsstýrismanninum í skattamálum".

77) Í § 120 h verða gjørdar hesar broytingar:
Í stk. 1, stk. 2, nr. 5), stk. 3 og stk. 5 verður "Landsstýrið" broytt til: "Landsstýrismaðurin í skattamálum".

78) Í § 120 j verða gjørdar hesar broytingar:
Í stk. 3 og 4 verður "Landsstýrið" broytt til: "Landsstýrismaðurin í skattamálum".

79) Í § 120 k, stk. 1 verður "Landsstýrið" broytt til: "Landsstýrismaðurin í skattamálum".

80) Í § 120 l verður "ger landsstýrið av" broytt til: "ger landsstýrismaðurin í skattamálum av".

81) Í § 120 m verður í 1. punktum "líkningarráðið" broytt til: "líkningarvaldið", og í 2. punktum verður "Landsstýrið" broytt til: "Landsstýrismaðurin í skattamálum".

82) Í § 120 n verður "hevur landsskattanevndin" broytt til: "hava kommunalu skattakærunevndirnar og landsskattakærunevndin".

83) Í § 122 verður "eftir avgerð landsstýrisins" broytt til: "eftir avgerð landsstýrismansins í skattamálum".

84) Í § 123 verður "líkningarráðnum" broytt til: "líkningarvaldinum"

85) § 124 verður orðað soleiðis:
"**§ 124.** Føroya Gjaldstova og Almannastovan hava skyldu til at vetta líkningarvaldinum upplýsingar um viðurskifti, sum kunnu hava týdning fyri skattaálíkningina. Landsstýrismaðurin í skattamálum kann gera nærri reglur í hesum sambandi.".

86) § 125 verða gjørdar hesar broytingar:
Í stk. 1 verður "landsstýrið" broytt til: "landsstýrismaðurin í skattamálum" og "líkningarráðið" broytt til: "Toll- og Skattaráðið".
Í stk. 2 verður "líkningarráðnum" broytt til: "líkningarvaldinum".
Í stk. 3, verður "Líkningarráðið" tvær ferðir broytt til: "Líkningarvaldið", og "líkningarráðið" eina ferð broytt til: "líkningarvaldið".
Í stk. 4 verður "líkningarráðið" broytt til: "líkningarvaldið", og skoytt verður upp í seinasta setning: "sum landsstýrismaðurin í skattamálum ásetir eftir tilmæli frá Toll- og Skattaráðnum".
Í stk. 5, 1. punktum verður "Líkningarráðið" broytt til: "Landsstýrismaðurin í skattamálum", og í 2. punktum verður "Líkningarráðnum" broytt til: "Líkningarvaldinum" og "skattavaldinum" broytt til: "líkningarvaldinum".
Í stk. 6 verður "Skattavaldið" broytt til: "Líkningarvaldið"

87) Í § 126 verður "landsstýrið" broytt til: "landsstýrismaðurin í skattamálum" og stk. 2 verður strikað.

88) Í § 127 verða gjørdar hesar broytingar:
Í stk. 1 verður "líkningarráðnum" broytt til: "líkningarvaldinum".
Í stk. 2 verður "líkningarráðið" broytt til: "líkningarvaldið".
Í stk. 3, 1. punktum verður "líkningarráðnum"

broytt til: "líkningarvaldinum" og í seinasta punktum verður "líkningarráðnum" broytt til: "líkningarvaldinum".

89) Í § 128 verður "eigna landsskattanevndin" broytt til: "eigna kommunalu skattakærunevndirnar og "landsskattakærunevndin".

Kap. 13

90) Í § 129 verða gjørdar hesar broytingar:
Í stk. 1, 2 og 3 stk. verður "landsstýrinum" broytt til: "landsstýrismanninum í skattamálum" og "skattavaldið" broytt til: "líkningarvaldið".

91) Í § 130 verður "skattavaldið" broyt til: "líkningarvaldið".

92) § 132 verður strikað.

93) § 135, stk. 4 verður orðað soleiðis:
"*Stk. 4.* Er ikki gjørligt at heinta skattin hjá skattskyldugu sjálvum, kann innheintingin um tað gerst neyðugt, verða gjørd í ogn, sum honum eiga um vinningur av ognini smb. § 5, stk. 4 verður skattaður hjá foreldrunum. Hetta er ikki galdandi við innheinting av skatti, sum ávísingarskattskyldugur skuldi havt avroknað.".

94) § 136, stk. 3 verður strikað.
Stk. 4, 5 og 6 verða eftir hetta stk. 3, 4, og 5.
Stk. 4, sum verður stk. 3 verður eftir hetta orðað soleiðis:
"*Stk. 3.* Reglurnar í stk. 1 og 2 verða eisini nýttar, tá tað snýr seg um innkrevjing av skattum og avgjøldum frá tí tíðini, áðrenn henda lóg kom í gildi.".

95) Í § 138 verður sum nýtt stk. sett.
"*Stk. 2.* Landsstýrismaðurin í skattamálum kann við kunngerð áseta nærri reglur um gjaldfreist í samband við at kæra verður um skattsetingina.".

Kap. 14

96) Eftir § 139 verður sum § 139 A sett:
"**§ 139 A.** Skatskyldugur, sum ikki hevur latið inn sjálvuppgávu, men hevur fingið ársuppgerð samhæn § 101, stk. 2 í hesi lóg, skal, um skattsetingin er ov lágt sett, fráboðað líkningarvaldinum um hesi viðurskifti innan 4 vikur eftir móttøkuna av ársuppgerðini. Freistin verður tó í fyrsta lagi at rokna frá, at freistin at lata inn sjálvuppgávu varð úti.
Stk. 2. Tann, sum við vilja ella av stórum gáloysni fremur brot á stk. 1, verður revsaður við sekt.
Stk. 3. Er brotið framt við tí í hyggju at sleppa undan at gjalda skatt til tað almenna kann revsingin hækkað til varðhald ella fongsul upp til 2 ár.
Stk. 4. Er brotið framt av einum partafelag, smápartafelag ella tílíkum, kann sektarábyrgd verða álagd felagnum sum so.".

97) Eftir § 139 A verður sum § 139 B sett:
"**§ 139 B.** Tann sum, uttan at tilfeldið er fevnt av ásetingunum í § 139 A, letur vera við at lata inn sjálvuppgávu við tí í hyggju at koma sær undan at gjalda skatt til tað almenna, verður revsaður við sekt, varðhaldi ella fongsli upp til 2 ár.".

98) Í § 141, stk. 1, nr.1) verður "landsstýrinum" broytt til: "landsstýrismanninum í skattamálum" og stk. 1, nr. 3) verður orðað soleiðis:
"3) ikki veitir teir upplýsingar, sum tilskilaðir eru í §§ 118-124.".

99) Í § 145, stk. 1 verður "Verður mett." broytt til: "Metir Toll- og Skattaráðið.", og "Líkningarráð Føroya" verður broytt til "landsstýrismaðurin í skattamálum"
Sum stk. 5 verður sett:
"*Stk. 5.* Landsstýrismaðurin í skattamálum kann heimila Toll- og Skattaráð Føroya at taka avgerðir í málum, sum verða viðgjørd eftir reglunum í hesum kapittli.".

100) Í § 146, stk. 1 verður millum § 139, § 140, innsett: "§ 139 A, § 139 B, ".
Í stk. 2 verður "samtykki líkningarráðsins" broytt til: "samtykki Toll- og Skattaráðsins", og seinasta punktum verður orðað soleiðis:
"Tá ið renta av eftirkravinum verður roknað, verður hon bert roknað av sjálvum eftirgjaldinum.".

101) Í § 147, stk. 2 verður eftir § 139 innsett: ", 139 A ella § 139 B ".

102) Í § 148 verður "landsstýrið" broytt til: "landsstýrismaðurin í skattamálum" og "Líkningarráð Føroya" broytt til: "Toll- og Skattaráð Føroya".

103) Í § 149 verður "landsstýrinum" broytt til: "landsstýrismanninum í skattamálum".

Kap. 15

104) Í § 151, stk. 1 verður "sum limir í landsskattanevndini" broytt til: "sum limir í kommunalu skattakærunevndunum og landsskattakærunevndini".
Í stk. 3 verður "landsstýrið" broytt til: "landsstýrismaðurin í skattamálum", og orðingin "sbr.

91 §" verður strikað.

105)§ 152 verður strikað

106)Í § 153, stk. 1 verður ávísingin til § 152 strikað.

107)Í § 154 verður stk. 1 strikað. Stk. 2 og 3 verða eftir hetta stk. 1 og 2.

Í stk. 2, sum verður stk. 1, verður "samb. 1. stk." strikað.

108)Í § 154 verður sum nýtt stk. sett:

"*Stk. 3.* Landsstýrismanninum í skattamálum verður eisini heimilað at seta reglur fyri, í hvønn mun myndugleikar aðrastaðir í kongarríkinum skulu kunna úttinna tað eftirlit, ið umrøtt er í kapitli 12."

109)§ 155 verður strikað.

110)Í § 156 verður "Landsstýrið" broytt til: "Landsstýrismaðurin í skattamálum".

111)Sum nýggj grein verður sett:

"§ 157 A. Landsstýrismaðurin í skattamálum kann geva Toll- og Skatta-fyrisitingini ella Toll- og Skattaráð Føroya, sum eru skipað við løgtingslóg um Toll- og Skattafyrisiting, heimild til at taka avgerðir eftir hesi lóg.".

Kap. 16

112)Í § 158 verður "Landsstýrið" broytt til: "Landsstýrismaðurin í skattamálum".

§ 2.

Henda lóg kemur í gildi 1. januar 1998.

§ 3.

Tær eftir løgtingslóg nr. 86 frá 1. september 1983 við seinnu broytingum av landsstýrinum og líkningarráðnum givnu kunngerðir og reglugerðir v.m. verða framvegis í gildi í tann mun tær ikki ganga ímóti reglunum í hesi lóg.

Stk. 2. Í givnum lógum, kunngerðum og reglugerðum verða tær heimildir, ið Líkningarráð Føroya hevur, fluttar til ávikavist landsstýrismannin í skattamálum, tá talan er um heimild til at gera nærri reglur, og Toll- og Skattaráð Føroya, tá talan er um at taka avgerð í málum.

Stk. 3. Galdandi reglur fyri skattainnheinting og álíkning, verða, burtursæð frá reglunum um innfating av sjálvuppgávu og ogningruppgerð, framhaldandi í gildi fyri tuntøkuárið 1997 og eldri ár.

Stk. 4. Broytingarnar í § 154 og § 155 ávirka ikki galdandi tvískattaavtalur.

Almennar viðmerkingar

Eins og samgonguskjalið eisini boðaði frá, fóru broytingar í inntøkuskattaskipanini at vera ein sera týðandi partur í politikkinum hjá sitandi samgongu.

Á heysti í 1996 kom fyrsti partur av hesi broyting. Skattaskipanin varð løgd um til bruttoskattaskipan og latin varð ein generellur skattalætti uppá 55. mió.kr.

Landsstýrið kemur nú við øðrum parti av ætlaðu broytingunum á inntøkuskattaøkinum. Høvuðspunktini av ætlaðu broytingunum eru:

Størri rættartrygd og greiðari býti millum politiska og umsitingarliga valdi

Líkningin og kæruskipanin verða reformerað, soleiðis at einstaki borgarin kemur at fáa eina skjótari og rættari viðger, og í hesum sambandi kann eisini nevnast, at tað framyvir verður møguligt at sleppa at bíða við at gjalda eitt skattakrav meðan ein bíðar eftir, at ein kæra verður viðgjørd.

Har heimildin at gera kunngerð fyrr hevur ligið hjá líkningarmyndugleikanum verður hon nú flutt til landsstýrismannin í skattamálum.

Myndugleikin at gera at dubultskattaavtalur verður fluttur frá landsstýrismanninum í skattamálum til løgtingið.

Hóast nevndu tiltøk koma at geva borgarunum størri rættartrygd, verða tiltøkini framd soleiðis, at tey hvørki geva kommunum ella landskassa ein eyka kostnað.

Tað verður lættari hjá borgarunum

Broytingarnar merkja, at milum 27.-30.000 borgarar sleppa undan at útfylla sjálvuppgávu og ognaruppgerð komandi ár.

Tiltakið merktr umsitingarliga sparing á Toll- og skattstovuni uppá umleið 1 mió.kr.

Fiskimenn og sjómenn

Vit siggja, at øll grannalond okkara hava gjørt serligar skattaskipanir fyri fiskimenn og sjómenn, soleiðis at hesir verða skattaðir linari enn borgarir sum arbeiða á landi. Hetta hevur gjørt kappingarstøðu okkara sera trupla. Í Føroyum hava vit verið afturhaldandi at gjørt serskipanir fyri hesar menn, orsaka av at tað snýr seg um okkara høvuðsvinnu, men seinastu árini hava vit sæð, at alt fleiri føroyskir sjómenn og fiskimenn búseta seg í grannalondunum orsaka av tí stóra munin í skattingini.

Vit hava eina dubultskattaavtalu við norðurlond undantikið Grønland, ið er til stóran fyrimunns fyri okkum. Hvat fiskimonnum viðvíkur, er tað bústaðarlandi, sum hevur loyvi at skatta ein persón, og hvat flest øllum øðrum inntøkum viðvíkur, er tað landið, har inntøkan kemur frá, sum hevur loyvi at skatta.

Til tess at forða fyri at enn fleiri av okkara dugnaligu sjómonn búseta seg í grannalondum okkara, serliga Noreg, Danmark og Íslandi av skattligum áðum og fyri betur at útnýtta teir fyrimunir vit hava í okkara norðurlendsku dubultskattaavtalu, skjýtur landsstýrið upp eina nakað lagaligari skatting av øllum okkara sjó- og fiskimonnum. Vald er ein loysn, ið gevur minst møguliga umsiting.

Tann beinleiðis fíggjarliga ávirkanin av broyttu reglunum fyri skatting av fiskimonnum er ein minni inntøka til landskassan uppá umleið 28 mió.kr. og ein minni inntøka til kommununar uppá umleið 14 mió.kr. Viðmerkjast skal tó, at í tann mun lækkingin í inntøkuskattinum fer til privata nýtslu, merkir hetta meirinntøku frá metrvirðisgjaldi og øðrum avgjøldum, uttan tað tó ber til at siga neyvt hvussu stór henda meirinntøka verður. Landsstýrið metir eisini, at sum frá líður fer tað at hava munandi fíggjarligan týdning fyri landskassan og kommunukassarnar at fiskimenn vera verðandi undir føroysku skattaskipanini, og at nakrir av teimum sum eru flutlir, flyta heimaftur.

Hjúnabandsskatting

Í samsvar við ásetingarnar í samgongusáttmálanum skjýtur landsstýrið upp at broyta hjúnabandsskattingina soleiðis, at hjúnastøðan í framtíðini ikki skal hava skattligan ávirkan.

Tað kemur at merkja eina lítla minking í inntøkunum hjá landi og kommunum, men orsaka av, at hjún ið reka vinnu saman, í mongum førum hava lagt sítt virksemi um til partafelag, verður ikki roknað við, at broytingin kemur at kosta fleiri milliónir.

Broytingar orsakað av nýggju stýrisskipanarlógini

Nógvar av broytingunum í fyriliggjandi uppskotum stava eisini frá tillaging til nýggju stýrisskipanarlógina.

Samanumtikið kann sigast, at hóast fyriliggjandi uppskot orsakað av lættanini í skattingini av fiskimonnum kuma at minka eitt sindur um inntøkuna í 1998, so metir landsstýrið, at uppskotið sum frá líður kemur at hava eina positiva ávirkan á føroyska búskapin.

Hesi eru kunngjørd um uppskotnu broytingarnar:

- Kommunubólkurin
- Toll- og Skattstova Føroya
- Umboð fyri feløg hjá fiski- og sjómonnum, ið eru fevndir av uppskotnu lógarbroytingunum.

Broytingarnar fevna um hesi lógaruppskot:

Broyting í løgtingslóg um landsskatt og kommunuskatt
Broytingar í løgtingslóg um áseting av skatti til landskassan
Løgtingslóg um Toll- og skattafyrisiting
Løgtingslóg um skattafrí samanlegging

Tíl hetta uppskot skal annars viðmerkjast
Í 1978 lógu Føroya Løgting munandi broytingar í skattalóggávuni. Frammanundan var tað soleiðis, at tey lokalu bygdarráðini/líkningarnevndirnar høvdu rættiliga stóra ávirkan á kommunuskattin hjá tí einstaka borgaranum.

Líknað varð eftir ogn og førimuni. Hvør kommuna hevði sína skattasamtykt og líkningarstiga, sum tó skuldi góðkennast av landsstýrinum eftir tilmæli frá líkningarráðnum. Í hesum kommunalu skattasamtyktum og líkningarstigum varð ásett, at skattainntøkan hjá hvørjum einstøkum skattgjaldara skuldi verða hækkað, tá inntøkurnar vóru í stórra lagi, hett hús, serstakliga stóran vinning í farnu árum, serstakliga góð rakstrarlíkindi, ella verða lækkað, tá inntøkurnar vóru í minna lagi, nógv børn, elli, sjúka, stór tap ella óhapp í farnum árum.

Við hesum grundgevingum kundi inntøkan verða hækkað við upp til 40% og lækkað við upp til 70%, og inntøkur undir 10.000 kr. kundu bygdarráðini/líkningarnevndirnar lækka eftir ætli.

Fleiri smáir frádráttir hjá løntakarum skuldu eisini metast um, eitt nú limagjøld til vinnufeløg, fiskimannafrádráttir pr. mánað, frádrátt fyri nautisk tól, sjúkrakassa.

Broytingin í 1978 bar í sær, at í staðin fyri nevndu smáu frádráttir lingu vit ein fastan løntakarafrádrátt, soleiðis at vit komu nærri einari bruttoskattaskipan hjá tí vanliga løntakaranum.

Møguleikarnir hjá kommununum at nýta reglurnar við hækkingum og lækkingum av inntøkuni, tá kommunuskattur varð álagdur, varð avtikin. Skattskylduga inntøkan, sum kommunuskattur varð roknaður av, var nú hin sama sum til landsskatt.

Hetta hevði við sær, at bygdarráðini/líkningarnevndirnar fingu nógv minni ávirkan á skattin hjá tí einstaka skattgjaldaranum, tí nú kom tað bert at verða hansara nettoinntøka og kommunuskattaprosentið, sum avgjørdu, hvussu høgur kommunuskatturin skuldi verða, og ikki eitt meira ella minni "rættvíst" met gjørt av bygdarráðslimununum.

Endamálið við broytingunum í 1978 var, at hetta skuldi verða fyrsta stógið í eini umlegging av skattaskipanini til samtíðarskatt eftir nøkrum árum.

Hetta arbeiðið byrjaði av álvara fyrst í 80-unum, og 1. apríl 1984 varð farið yvir til samtíðarskatt.

Ongar grundleggjandi broytingar vóru gjørdar í sjálvari lógini um inntøkuskatt, men harafturímóti varð øll innkrevjingarskipanin grundleggjandi løgd um til, at fyribilsskattur varð goldin av inntøkuni, tá hon var vunnin, við tí aðalendamáli at fyribilsskattur og endaligur skattur í flestu førum skuldi samsvara, so sleppast kundi undan frestandi skatti og teimum trupulleikum, ið standast av eftirstøðum og innkrevjing av teimum.

Reglurnar um innlating av sjálvuppgávu, tá inntøkuárið var lokið, og sjálv álíkningin av hesi sjálvuppgávu broyttist ikki. Tó var tað nú soleiðis, at alt eftir um fyribilsskatturin var størri ella minni enn endaliga álíknaði skatturin, kundi skattaborgarin fáa ávikavist avlopsskatt ella frestandi skatt.

Øll skuldu fraanvegis lata inn sjálvuppgávu, hóast tað í mongum førum var soleiðis, at líkningarvaldið hevði teir neyðugu upplýsingarnar, sum skuldu til fyri at álíkna skattin, men tað tók sína tíð at menna EDV-skipanirnar, og hartil var tað rættiliga kostnaðarmikið. Tað varð tí ikki hildið ráðiligt at taka ov stór stig, áður enn vissa var fingin fyri, at skipanirnar virkaðu.

Broytingin hevði eisini við sær, at nú kundi skattaborgarin, nær tað skuldi vera í árinum, koma við broytingum til fyribilsskattsetingina, soleiðis at fyribils- og endaligi skatturin samsvaraðu so væl sum gjørligt, tá árið var farið.

Hetta hevði tá broyting við sær, at hvar tað frammanundan stórt sæð bert var samband millum skattaborgaran og líkningarvaldið, tá líkningin fór fram, so kom hetta samband nú at vera meira javnt býtt yvir alt árið. Starvsfólkið í fyrisitingini fekk betur kunnleika til fíggjarviðurskiftini hjá hvørjum skattgjaldara sær, tá tey nú skrásettu flestu upplýsingar á sjálvuppgávuni bæði gjøgnum árið, og tá endaliga sjálvuppgávan og ognaruppgerðin varð latin inn eftir árslok.

Í flestu førum hava starvsfólkini á økisskrivstovunum betur kunnleika til viðurskiftini enn tey, sum sambært lógina skulu hava ábyrgd av líkningini, og í mongum førum eru tey noydd at taka avgerðir, sum skulu avgreiðast her og nú, uttan at hava lagt spurningarnar fyri bygdarráðið/líkningarnevndina, sum sambært lógina eiga at taka avgerðir.

Hetta er eisini neyðugt, um skipanin skal virka bæði skjótt og væl, soleiðis at ein broyting í inntøkuni hjá einum borgara verður skrásett beinanveg.

Hetta sær út til at hava virkað væl, tí ongin er betur verjd fyri borgaran enn hann sjálvur. Hann fylgir væl við sínum skattaviðurskiftum, og ger vart við seg beinanveg, hann er í iva.

Nógvir av teimum spurningum, sum ein vald líkningarnevnd fyrr tók sær av, verða nú loystir dagliga av starvsfólkunum í fyrisitingini. Vegleiðingin frá líkningarráðnum er nøktandi, og er hon stórt sæð tann sama til tær valdu líkningarnevndirnar, so flestu spurningar eru loystir, áðrenn teir koma á teirra borð. Tað, sum líkningarnevndirnar tí nú oftast skulu taka støðu til, eru tær kærur um álíkningina, sum koma frá skattaborgarunum.

Tað kemur so gott sum ikki fyri, at nevndarlimir koma við upplýsingum á fundum, sum føra til nakrar broytingar í skattskyldugu inntøkuni, sum økisskrivstovan ikki hevur gjørt vart við frammanundan.

Í samtíðarskattalógini varð álagt líkningarráðunum at seta neyðugar deildarskrivstovur á stovn kring landið. Hetta var eisini neyðugt, um samtíðarskattalógin skuldi náa sítt endamál at virka skjótt og væl, soleiðis at skattaborgarin altíð fekk møguleika at dagføra sína skattaviðurskifti.

Samanleggingin av toll-, avgjalds- og skattafyrisitingini hevur nú havt við sær, at deildarskrivstovurnar eru broyttar til økisskrivstovur, sum bæði umsita toll, avgjøld (MVG) og skatt.

Teknisku broytingarnar, eitt nú at peningastovnarnir lata allar teir upplýsingar, ið eru neyðugir fyri skatta-álíkningina til Toll- og Skattstovuna, hava við sær, at ein stórur partur av álíkningini kann verða gjørdur maskinelt. Í rættiliga mongum førum kann sigast, at tað ikki er neyðugt, at fólk lata inn sjálvuppgávu, tí upplýsingarnir eru skrásettir frammanundan.

Verandi hóggáva

Toll- og Skattstova Føroya hevur tí í eina tíð arbeitt við ætlanum um at automatisera líkningarmannagongdina mest møguligt. Í januar 1995 varð fólk sett burturav til at arbeiða við eini verkætlan, sum skuldi lýsa núverandi líkningarmannagongd. (Líkningarprosessin, upplegg til tjak, Toll- og Skattstova Føroya. Barbara á Tjaldrafløtti, cand.scient. adm. maj 1995).

Endamálið við verkætlanini var at gera eitt uppskot til at betra um álíkningarmannagongdina og at betra um rættartrygdina. Arbeiðið endaði við hesum uppskotum:

1. Skipanin við líkningarnevndum verður broytt soleiðis, at kommunalu líkningarnevndirnar/bygdarráðini verða kærustovnar burtur av.

2. Toll- og Skattstova Føroya skipar fyri allari skattaálíkning.

3. Landsskattanevndin verður styrkt umsitingarliga og fakliga.

Tá hugsað varð um at betra líkningarmannagongdina, varð bæði hugsað um at tillaga skattafyrisitingina soleiðis, at nýtiðar tøkni kundi nýtast í mest møguligan mun í fyrisitingini, at skattaborgarin fekk eina betur og skjótari tænastu, og at arbeiðsorka varð spard til tær dagligu rutinuuppgávurnar, sum alla verða gjørdar tvær ferðir.

Hetta kundi best gerast við at automatisera líkningarmannagongdina í mest møguligan mun.

Komið varð skjótt eftir, at núverandi lóggáva avmarkaði møguleikarnar fyri stórvegis automatiseringum.

Skipanin er í dag tann, at bygdarráðini skipa fyri skattaálíkningini í kommununi, men kunnu eisini velja eina líkningarnevnd, sum sjálvstøðugt kann taka sær av álíkningin (§ 84 í Skattalógini). Smáu kommunurnar skipa sjálvar fyri álíkningini, meðan tær størru velja líkningarnevndir. Tað vil siga at 49 bygdarráð/líkningarnevndir skipa fyri skattaálíkningin alla at millum 200-250 fólkavaldir persónar eru við í álíkningini. Ymiskt er sjálvandi hvussu hesar 49 nevndir virka, hvussu tær eru samansettar, hvøm áhuga tær hava í arbeiðnum, og hvussu ofta fundir verða haldnir o.a.m.

Í dag fáa teir lokalu líkningarmyndugleikarnir fyrilagt stórt sløg øll mál, sum fyrisitingin hevur broytt og fingið semju við skattaborgaran um, og sum líkningarmyndugleikin stórt sløg ikki ger viðmerkingar til. Hartil koma tey mál, sum fyrisitingin ikki tekur støðu til sjálvstøðugt, men leggur fyri teir lokalu líkningarmyndugleikarnar við sínum tilmæli. Bygdarráðið/líkningarnevndin tekur tá ofta støðu út frá tí, sum hon hevur fingið fyrilagt av fyrisitingini, ella sær málið við eygunum hjá fyrisitingini. Um skattaborgarin tá kærir, kennir bygdarráðið/líkningarnevndin seg ofta bundna av tí avgerð, hon hevur tikið fruomanundan.

Tað er tí ójavnt, hvussu Toll- og Skattstovan merkir leiklutin hjá nevndunum í dagliga arbeiðnum, men sambært lóggávuna eru tað bygdarráðini, ið skulu hava sjálvuppgávurna og skipa fyri álíkningini.

Hetta avmarkar møguleikarnar fyri automattiseringum munandi, serliga um hugsað verður um at avtaka sjálvuppgávuna í núverandi líki, tí bygdarráðini skulu sambært verandi lóggávu hava eintak av sjálvuppgávunni. Automatiseringin missir tí sítt endamál, um ein sjálvuppgáva skal skrivast út til bygdarráðini.

Núverandi lóggáva hindrar eisini, at skattaborgarin kann fáa sína endaligu skattaavrokning í byrjanini av árinum, tí sambært núverandi lóggávu skulu bygdarráðini álíkna sjálvuppgávuna, áðrenn Toll- og Skattstovan kann gera endaligu avrokningina.

Skotið verður tí upp at broyta lóggávuna um líkningarmannagongdina soleiðis, at Toll- og Skattstova Føroya skipar fyri allari skattaálíkningini eftir fastlagdari mannagongd, harvið verða skaptir møguleikar fyri at automatisera ein stóran part av løntakara- og pensionistaálíkningini. Krav verður av fyrisitingini, at skattaborgarin skal hava loyvi at úttala seg, áðrenn broyting verður gjørd í hansara sjálvuppgivnu inntøku, og at semingsroynd við hann skal verða roynd, áðrenn málið verður avgreitt frá fyrisitingini. Eydnast hetta ikki, stendur tað honum tá í boði at kæra til lokalu skattakærunevndina, sum tá kann útvega sær allar upplýsingar um málið, og eisini krevja fyrisitingina eftir áliti í málinum. Hartil kemur, at nevndin skal gera eina frágreiðing um málið, og taka tað við, sum hon heldur er avgerandi fyri støðutakanina hjá hvørt í málinum.

og síðani leggja tað fyri kæraran, sum bæði skrivliga og munnliga kann koma við viðmerkingum til málið. Broytingin vil eisini økja um rættartrygdina, tí skattaborgarin hevur fyrst havt møguleika at koma við viðmerkingum til málið, áðrenn fyrisitingin tekur endaliga støðu. Hann fær 4 vikur at fyrireika eina kæru til eina kommunala skattakæranevnd (sí løgtingslóg um Toll- og Skattafyrisiting), sum so kann seta seg nágreinfliga inn í kæruna, og við heilt nýggjum eygum viðgera kæruna og gera ein úrskurð.

Um kæraran ikki er nøgdur við úrskurðin, kann hann kæra víðari til landsskattakæranevndina. Um stýrið ikki er nøgt við úrskurðin hjá skattakæranevndini, kann tað leggja málið fyri landsskattakæranevndina, men bert við loyvi frá Toll- og Skattaráðnum.

Víst verður annars til Líkningarprosessin, upplegg til Tjak, og viðmerkingarnar til løgtingslóg um Toll- og Skattafyrisiting.

Meðan arbeitt hevur verið við at gera uppskot til broytta líkningarmannagongd, hevur Føroya Løgting samtykt fleiri broytingar í skattalógini. Frádráttur fyri privatar rentuútreiðslur, frádráttur fyri ferðing og dupult húsarhald, frádráttur fyri telefonútreiðslur hjá langfarasjómonnum, frádráttur fyri barnapening, arbeiðsloysistrygging og aðrir frádráttir eru nú tiknir úr skattalógini.

At hesir frádráttir eru tiknir úr skattalógini, ger tað munandi lættari at arbeiða við einum uppskoti um at automatisera sjálvuppgávuna, tí við hesum tiltøkum koma nógv fleiri skattaborgarar at fáa gleði av automatiseringini, tí teir nú fyri tað fyrsta kunnu fáa eina skattaavrokning fyrr, og fyri tað næsta tí hetnda avrokning hjá nógv flestu løntakarum og pensionistum verður tann rætta, og tí tann einasta teir fáa. Hartil kemur - alt annað líka - at hesar broytingar gera, at sleppast kann undan munandi milliónum goldnan fyribilsskatt og endaligan avroknaðan skatt við árslok hjá allar flestu løntakarum og pensionistum.

Sjálvuppgávan

Í framlagda lógaruppskotinum verður skotið upp at umleggja skipanina við at lata inn árliga sjálvuppgávu og ognaruppgerð soleiðis: at tað í teim førum, har ið líkningarvaldið frammanundan hevur teir upplýsingar, sum neyðugir eru fyri at fremja tu árligu skattauppgerðina á rættan hátt, skal ikki verða neyðugt at lata inn sjálvuppgávu.

Toll- og Skattstovan roknar skattin út, og verður hetnda útrokning grundað á teir upplýsingar, sum Toll- Skattstovan hevur skráset í árinum. Ársuppgerðin verður send skattaborgaranum í byrjanini av árinum, eftir at inntøkuárið er lokið.

Bert um tey tøl, sum skattaútrokningin er gjørd eftir, ikki samsvara við tey, skattaborgarin sjálvur hevur, skal hann lata sjálvuppgávu inn. Samsvara tølini, er útrokningin, sum hann hevur fingið frá líkningarvaldinum, samstundis hansara endaliga sjálvuppgáva.

Hjá pensiónistum og løntakarum, sum bert fáa pensión og løn gjøgnum afturhaldsskipanina, hevur líkningarvaldið í flest øllum førum skráset teir upplýsingar, ið viðvíkja skattiligu viðurskiftunum fyri farna árið. Nevndi inntøkubólkur kann við hesum uppskoti alt annað líka sleppa frá at lata inn sjálvuppgávu. Leysliga mett, snýr hetta seg um 70-75% av teimum, sum í dag lata inn sjálvuppgávu.

Árliga skattauppgerðin kunn soleiðis verða latin einum stórum parti av skattaborgarunum fyrr uppá árið, og ein stórur partur av bæði pensionistum og løntakarum sleppa frá at lata inn sjálvuppgávu.

Um skattaborgarin fær at vita, at hann kann fáa rætta skattauppgerð stutt eftir at skattaárið er lokið, um hann í sjálvum skattaárinum hevur latið líkningarvaldinum allar upplýsingar, sum eru neyðugir fyri at gera eina rætta skattauppgerð við árslok, vil hann uttan iva gera tað.

Úrslitið verður, at tann parturin av skattaborgarunum, ið ikki skal lata inn sjálvuppgávu, kemur at økjast.

Ein annar stórur fyritmunur við hesum er, at arbeiðsorka líkningarvaldsins kann nýtast skilabetri, soleiðis at líkningarvaldið ikki sum í dag, nýtir stóran part av arbeiðsorku síni at skráseta og viðgerða upplýsingar, sum tað hevur frammanundan, men heldur nýtir arbeiðsorkuna uppá tey viðurskifti, sum verulíga krevja eina málsviðgerð. Tað, sum her verður hugsað um, er, at størri partur av arbeiðsorkuni tá kann verða nýtlur uppá skattauppgerðir, sum m.a. eru grundaðar á sjálvuppgávu við roknskapi, ella á skattgjaldarar sum bæði hava A og B inntøku.

Við hesum kann fáast betur tamarbald á B-skattinum, sum í dag verður mettur at vera ein tann størsti trupulleikin í skattaviðgerðini og skattainnkrevjantini sum heild. Sigast kann, at í dag verður B-skatturin skrivaður út automatiskt, síðani brúkar líkningarvaldið arbeiðstíð fyri at vita, hvat er hent.

Hetta kann gerast betur, um líkningarvaldið áðrenn útskrivingin fer fram kann kanna, hvat skal henda, t.v.s. líkningarvaldið kemur at stýra hesum partinum av skattsetingini nakað meira manuelt enn gjørt verður í dag. Betur samband eigur at verða fingið í lag við B-skattaborgaran, áðrenn rokning verður útskrivað, so hann fær møguleika at meta betur um síni komandi viðurskifti enn gjørt verður í dag.

Treytin fyri hesum er, at arbeiðsorkan verður flutt frá tí partinum av líkningararbeiðinum, sum kann gerast so gott sum sjálvvirkandi til tær arbeiðsuppgávur, sum ikki kunnu gerast sjálvvirkandi.

Í stuttum kann sigast, at automatiseringin skal bera í sær:

at skattauppgerðin skal út til borgararnar so skjótt sum til ber.
at skattauppgerðin skal gerast so rætt og automatisk sum til ber, so óneyðugt verður hjá flest møguligum skattaborgarum at lata inn sjálvuppgávu.
at skattauppgerðin skal verða lætt at skilja og
at avlops- og frestandi skattur verður avmarkaður mest møguligt.

Framtíðarætlanir:
Her skal bert verða nevnt, at um tær broytingar, sum her eru skotnar upp at gera í skattalógini, verða samtyktar, kemur støðugt at verða arbeitt fram móti,

at flest møgulig skulu kunnu fáa uppgerð innan 1. februar árið eftir skattaárið, og

at um skattauppgerðin verður broytt, skal uppgerðin kunna skrivast út beinanveg.

Hvat viðvíkur skipanini annars verður víst til viðmerkingarnar, ið gjørdir eru til kap. 10.

Ognaruppgerðin

Tá skattalógin var broytt í 1963, varð álagt øllum, sum eru undir skattskyldu, at lata inn fullfiggjað yvirlit yvir allar ognir, fíggjarlig rættindi við tilskilan av virðinum og yvirlit yvir allar skuldir skattgjaldarans hvørt ár við árslok.

Henda ognaruppgerð hevur ongantíð verið álítandi, og hevur ikki víst veruligu virðini av ognunum hjá tí skattskylduga. Skuldir skattgjaldarans kunnu í flestu førum skrásetast neyvt, men tá tað snýr seg um ognirnar, so eru virðini á teimum í flestu førum ikki eftirfarandi, sjálvt um lógin hevur reglur um, hvussu hesar skulu metast; men tá hetta er latið upp í hendurnar á tí skattskylduga at gera metingar um, og onki lógarbundið eftirlit er við metingunum, gevur slík uppgerð av samlaðu fíggjarstøðuni við árs enda sjáldan eina rætta mynd av, hvussu tann skattskyldugi veruliga er fyri fíggjarliga.

Í álíkningini kann slík ognaruppgerð ikki nýtast, sum nakað álítandi tekin um broytingar í ognini. Bert tá tað snýr seg um peningaligar ognir kunnu skráseting arnar eftirkannast og ásetast neyvt. Sum grundarlag fyri almannaveitingum er hon heldur ikki nýtilig. Heldur ikki er hon nokur álítandi kelda yvir skráseting av ognum í landinum.

Líkningarvaldið hevur heldur ikki nýtt stórvegis orku til at kanna ognaruppgerðirnar, tí tað er lóggávan um meting av ognum ov ógreið. Bert, tá talan er um at gera støri kanningar av skattaviðurskiftunum hjá einstøkum skattgjaldarum, hevur ognaruppgerðin verið nýtt sum amboð í slíkari kanning, og teir møguleikar, sum eru í skattalógini um at krevja nágreiniligar útgreitingar av ognarviðurskiftunum, hava tá verið nýttir.

Toll- og Skattstovan hevur seinasta tvey árini skráseti allar ognaruppgerðir saman við sjálvuppgávuni, so í framtíðini er ikki neyðugt at skráseta annað enn broytingar í ognarviðurskiftunum hjá hvørjum einstøkum skattgjaldara. Stórur partur av upplýsingunum á ognaruppgerðini verða nú latnir av peningastovnum v.m. beinleiðis til Toll- og Skattstovuna, so tær broytingar, sum í hesum uppskoti verða skotnar upp at gera, byggja á hendan veruleika.

Umleggingin av sjálvuppgávuni og ognaruppgerðini skuldi stórt sæð verið útreiðsluneutrak, men kemur tó bæði at gera fyrisitingina einfaldari og spara arbeiðsorku, tí ið nakað er fráliðið.

Skotið verður upp, at broytingarnar koma í gildi 1. januar 1998, soleiðis at skipanin longu virkar, tá ið skattsetingin fyri 1997 skal gerast.

Annars verður víst til viðmerkingarnar, ið gjørdir eru til 11. kap.

Hjúnabandsskattingin

Í samgonguskjalinum millum flokkarnar, ið skipa verandi landsstýrissamgongu, er m.a. áseth, at samgongan miðjar ímóti, at tillaga føroysku skattalógina soleiðis, at hjúnabandsstøðan í framtíðini ikki skal hava skattliga ávirkan.

Sama endamál hevði undanfarna landsstýrissamgongan eisini í sínum samgonguskjali og setti undanfarna samgonga arbeiðsbólk at gera álit um hesi viðurskifti. Arbeiðið hjá bólkinum hevur hildið fram undir verandi samgongu og lat bólkurin landsstýrinum álit sítt til jólar 1996.

Arbeiðsbólkurin hevur í eini ásamman av, at verandi skattareglur fyri skatting av hjúnum eru ótíðarhóskandi og ikki seta mann og kvinnu javnhjóðis og í nokrum førum skatta hjún harðari enn um talan var um tvey ógift, mælt til, at skattalóggávan verður broytt soleiðis, at skattalógin tekur minsti møguligt atlit til, at talan er um hjúnafelagar t.v.s. at gjørdar verða reglur, sum ikki seta hjúnafelagar skattliga í aðra støðu, enn um talan var um ógiftar skattgjaldarar.

Bólkurin hevur í áliti sínum víst á ymiskar vansar við, at skattalógin verður broytt frá verandi skipan til, at einki atlit verður tikið til hjúnabandið. Í hesum sambandi er m.a. víst á, at um skattalógin verður "ruddað" fyri frádráttir, og skattastigin gerst meir proportionalur, vil hetta verða viðvirkandi til at skapa betri fortreytir fyri at gjøgnumføra broytingarnar, eins og hetta vil verða størsta verndin móti skattaspekulatión við flyting av innøkum og ognum millum hjún.

Pr. 1. januar 1997 varð skattalógin broytt soleiðis, at nærum allir frádráttir vóru settir úr gildi, og viðførir tann gjøgnumførda bruttoskattaskipanin eftir landsstýrisins tykki, at tíðin nú er búgvin til at broyta skattalógina, so at aðalmálið hjá landsstýrissamgonguni - um at hjúnabandsstøðan ikki skal hava skattligan ávirkan - verður rokkið.

Verandi skattareglur fyri skatting av hjúnum byggja á meginreglurna um samskatting við manninum sum høvuðspersóni. T.v.s. at útgangsstøði er, at maður og kona verða skattað sum ein eind. Í breiðasta týdningi

merkir hetta, at øll inntøka hjá konu og manni verður skattað sum eitt samlað upphædd, um ikki aðrar serskipanir áseta annað. Hetta vísur seg m.a., tá ið talan er um inntøkur av sjálvstøðugum vinnuvirki, har hjúnini bæði luttaka, tá talan er um sokallaðar passivar inntøkur og kapitalinntøkur eitt nú sum leigutinntøkur, rentu og kursvinning og inntøku av jarðarogn. Við veruligari skipan, har ið landsskatturin verður kravdur eftir eini progressivari skipan, viðførir hetta sjálvsagt eina støtri skattabyrðu fyri hjúnini, enn um talan var um tveir ógiftar skattgjaldarar í somu støðu.

Samskattingin av hjúnafeløgum hevur verið og er partvís grundað á hugsanina um, at hjúnalagið ella familjan er ein fíggjarligur felagsskapur og forbrúkseind, sum m.a. vísir seg við, at hjúnafelagar hava forsyrgjaraábyrgd fyri hvørjum øðrum og ónyndugum børnum teirra, og vanliga eisini skyldu at luttaka í felags útreiðslum hjá felags húshaldinum eins og í serligum førum at ábyrgjast í felag fyri ta skuld, ið kann verða tengd at útreiðslunum hjá húshaldinum - eitt nú skattakrøvum.

Samskatting av hjúnafeløgum hevur av fyrstan tíð ikki verið mett at verið nakur skattligur ampi, tí sum samfelagsmynstrið varð, so arbeiddi gift kvinna ikki úti, t.v.s. at í roynd og veru hevði hjúnalagið aloftast bert inntøkuna hjá manninum at liva av, og við at konan ikki hevði inntøku sum so, so viðførdi samskattingin vanliga ei heldur nakra økta skattabyrðu í mun til, hvat ið annars varð galdandi fyri stakar persónar.

Samfelagsmynstrið er tó altíð í støðugari broyting og við tíðini er arbeiðsstøðan hjá kvinnuni eisini broytt so munandi, at vanligt er vorðið, at kvinnan eins og maðurin arbeiðir úti. Við hesum er, sum vera man, uppstaðin ein tørvur á at dagføra skattalóggávuna, so hædd verður tikið fyri, at báðir hjúnafelagarnir eru vorðnir partur av arbeiðsmarknaðinum, og at inntøkan hjá báðum er ein neyðugur og týðandi partur av tí fíggjarliga felagsskapinum í hjúnalagnum. Ikki eru tað bert fíggjarligu broytingarnar hjá familjuni, sum krevja broyting við sær, men eisini tann økta tilvitanin um sjálvstøðugar kvinnur, eru viðvirkandi til, at tørvur varð og enn er at fáa skattalóggávuna dagførda í mun til nútíðarviðurskifti okkara.

Fyri at bøta um vansarnar, sum hava staðist av samskatting, hava verið royndar ymiskar frádráttarskipanir, m.a. har ið maðurin fekk sokallaðan kontufrádrátt, um konan varð útiarbeiðandi, t.v.s. maðurin skattaði av inntøkuni hjá sær og konuni, men fekk so ein serligan kontufrádrátt, sum eitt slag av kompensatión fyri tí annars øktu skattabyrðuni. Seinni, tá ið allir persónar fingu rætt til løntakarafrádrátt og persónsfrádrátt, fingu hjún rætt til at flyta møguligan ónýttan frádrátt millum sín.

Í 1978 varð sett í gildi partvís serskatting fyri kvinnur. Broytingar vóru gjøgnumførdar við løgtingslóg nr. 71 frá 24.oktober 1978, sum vóru stórar broytingar av tágaldandi skattalóg, løgtingslóg nr. 50 frá 2.juli 1963 um landsskatt og kommunuskatt. Í hesum broytingum varð meginreglan um samskatting av hjúnum við manninum sum høvuðspersóni fasthildin, men við tí í praksis so týðandi broyting, at konan skuldi skattast sjálvstøðugt av ávísum inntøkum.

Broytingarnar vóru ætlaðar sum ein ávegis roynd at avtaka samskattingina av hjúnum og vóru samstundis eisini fyrireikingar til samtíðarskattalógina. Alt kundi bent á, at ætlanin var at gjøgnumføra serskatting av giftum skattgjaldarum samstundis, sum umlegging til samtíðarskattaskipanina skuldi gerast.

Við broytingini í 1978 varð, sum nevnt, miðað móti at avtaka alla samskatting av hjúnum, men varð tó ikki rokkið fult á mál. Í staðin gjørdist reglan, sum síðan seinni óbroytt er ásett í galdandi skattalóg, at giftur maður verður skattaður av allari inntøku síni og inntøkuni hjá konuni, um tey eru sambúgvandi og bæði eru undir fullari skattskyldu í Føroyum. Frá hesi meginreglu eru tó, sum áður nevnt, ásett munandi undantøk, sum viðføra at konan hóast nevndu samskatting, verður sett sjálvstøðugt í skatt av flest øllum inntøkusløgum. Talan er t.d. um inntøkur stavandi frá:

a) sjálvstøðugum virki uttan fyri vinnu og virki mansins
b) ávísum almannaveitingum, so sum avlamis- og fólkapensión, eftirløn, arbeiðsloysisstuðli, sjúkraløn og dagpeningi

c) uppihaldspeningi, haldi, studningi, gávum, samsýtingum, o.tl., sum bert verða veitt henni, og sum ikki verða latin av manni hennara, ið hon býr saman við.

Uppbýtið av teimum inntøkum, ið gift kvinna kann skattað av sjálvstøðugt, er merkt av, at so gott sum øll lønarinntøka (A inntøka), ið kvinnan vinnur í starvi uttan fyri virkið hjá manni sínum, er at meta sum hennara persónligu inntøka, eins og allar persónligar veitingar eisini føra til sjálvstøðuga skatting.

Lógarbroytingin frá 1978 viðførdi so munandi broyting av samskattingini av hjúnum, at tað nú meir er undantakið enn reglan, at samskattingin fær nakran skattligan týdning.

Samskatting av hjúnafeløgum hevur ikki bert havt týdning í mun til inntøku- og ognarviðurskiftini, men hevur inntil 1. januar 1998 eisini havt ávirkan á skattligu útreiðslustøðuna, soleiðis at fyri hjún hava verið galdandi ymiskar serreglur í mun til tær frádráttarskipanir sum vóru í skattalóggávuni.

Skattingin í Føroyum fevnir sum kunnugt um inntøkur - t.d. arbeiðsinntøkur og kapitalinntøkur og avkast - men í Føroyum er ikki galdandi nakar generellur ognarskattur. Samskattingin í mun til ognirnar í hjúnalagnum sæst tí bert við, at hjúnafelagar árliga skulu lata skattavaldinum eina felags ognaruppgerð, t.v.s. ogn og skuld hjá konu verða tald og sett upp í ognaruppgerðina hjá manninum. Umframt at tað er maðurin, ið skattar av møguligum inntøkum av ognum í hjúnalagnum.

Sum undantak frá høvuðsreglunum um, at gávur eru skattskyldugar, fyriber ognarvøkstur, sum stavar frá giftu, ikki skatt við sær, eins og gávur millum hjún eru skattafríar.

Av øðrum skattligum serreglum, ið gera seg galdandi, tí ið talan er um hjúnafelagar, kunnu eisini nevnast reglurnar í grein 34 í skattalógini, sum er áseting um serreglur, tá ið talan er um avhendingar av aktivum, ið verða nýtt í vinnuvirki.

Skattareglurnar hava í dag eisini serreglur fyri hjún, tá ið kemur til alment mótrokning av frestandi skatti og avlopsskatti, og fyri innheintan av skatti sum heild. Sum frávik frá vanligum mótrokningsfyritreytum, m.a. um at kravið, ið verður mótroknað, skal stava frá sama persóni, sum eigur ágóðan, ið verður mótroknaður, verður í hjúnalagnum mótroknað í avlopsskatti hjá einum hjúnafelaga fyri frestandi skatti hjá hinum hjúnafelaganum.

Eisini fyriskrivar skattalógin eina felagsábyrgd fyri skattaskuld, ið uppstendur í hjúnalagnum, tó soleiðis at ábyrgdin hjá samábyrgjandi hjúnafelaganum er sekundær í mun til heftilsi hjá sjálvum skuldaranum. Sum omanfyri er greitt frá, er fylgjan av verandi lógávu, at tað meir er undantakið enn høvuðsreglan at samskattingin av hjúnum fær ávirkan - negativa ávirkan á skattligu støðuna hjá hjúnum - tá ið støða teirra verður sett í mun til tvey ógift sambúgvandi í somu støðu. Har, ið samskattingin hevur ávirkan, tað verið seg á inntøku av sjálvstøðugum vinnuvirki, ið báðir hjúnarfelagarnir luttaka í, ella av inntøkum av ognum teirra, mugu verandi reglur tykjast enn meir tyngjandi fyri tey einkultu, sum reglurnar raka.

Fyri hjúnafelagar eru í hjúnabandslógini reglur, sum siga, hvussu hjúnafelagar kunnu ráða yvir ognum sínum og hefta fyri skyldum sínum í hjúnalagnum. Sigast kann, at í hjúnalagnum er støðan hjá tí einstaka á hesum øki ikki serliga ymisk enn hjá tí samlivandi ikki giftu ella hjá tí staka persóninum. Hvør einstakur eigur tað viðkomandi stendur fyri, og kann ráða yvir hesum uttan at spyrja hin.

Tær reglur, sum eru sermerktar fyri hjúnafelagar, og sum ikki galda fyri samlivandi ógift, eru býtisreglurnar, sum galda, tá hjúnalagið heldur uppat, antin tí tað verður slitið við sundurlesing, hjúnaskilnaði ella orsaka av deyða.

Fyri stakar persónar og samlivandi ógift fólk eru skattareglurnar fullt í samsvar við tær galdandi borgarligu reglurnar. Hetta hevur við sær eina tilvitan um egin ognar- og skuldarviðurskifti. Fyri gift víkja skattareglurnar nógv frá teimum borgarrættarligu reglunum. Hetta er óheppið, tí tað gevur tí einstaka eina ógreiða mynd

og tørvandi vitan um egin borgarrættarlig rættindi og skyldur. Henda tørvandi vitan um egin ognar- og skuldarviðurskifti hevur óhepnar avleiðingar, bæði fyri tann einstaka í hjúnalagnum, men eisini tá skiftast skal, serliga í sambond við seperatión ella hjúnaskilnað.

Á hendan hátt stýrir skattalógin handlingum í hjúnabandinum, eins og skattligu reglurnar hava ávirkan á støðutakanina hjá pørum um fyrimunir og vansar við at verða gift ella ikki.

Landsstýrið metir, at tað ikki eiga at vera tær skattligu reglurnar, sum gera av, hvussu fólk skipa seg, t.vs. sum samlivandi ikki gift ella sum hjúnavíga. Herumframt eiga reglurnar fyri gift og ógift at líkjast mest møguligt so hjúnabandsstøðan gerst skattliga neutral.

Landsstýrið hevur ta áskoðan, at rættasta býti av bæði inntøkum og ognum eigur at fara fram í samsvar við borgarrættarligu reglurnar, ið galdandi eru fyri hjúnarlagið.

Landsstýrið mælir tí í hesum uppskoti til at seta úr gildi skattligar serreglur, ið eru galdandi fyri hjún, so hjún sum meginregla koma at nýta somu princippir fyri uppbýti av inntøku, ogn og skuld, sum í dag eru galdandi fyri stakar persónar - eisini hvat viðvíkur ábyrging fyri skattaskuld. Men fyri at skapa greiðari reglur á teimum økjum, har ið trupult kann vera at avgera, hvør av hjúnunum er rætti inntøkumóttakari ella eigari av tini ogn, verður landsstýrismannin í skattamálum heimilað at seta út neyvari reglur fyri, hvussu inntøka og ogn eigur at verða gjørd upp skattliga í teimum førum, tá ið inntøka stavar frá sjálvstøðugum vinnuvirki og tá ið talan er um inntøku av ognum í hjúnalagnum. Her verður serliga hugsað um reglur, sum greitt siga, hvussu inntøkubýti av sjálvstøðugum vinnuvirki, ið bæði hjúnini lutfalsliga í, skal fara fram. Hvussu farast skal fram, tá ið hjún gera sínamillum lønaravtalu og reglur fyri hvør teirra eigur at skatta av inntøkum av ognum teirra, so tilvildarlig ognarflyting ikki fær skattliga bindandi virkning.

Hóast omanfyristandandi, so metir landsstýrið, at tær serreglur, sum ásettar eru um gávur millum hjúnafelagar, ognarvøkstur við giftu og ognaravhending millum hjún eiga at vera verandi í gildi. Hetta kemst av, at hesar reglur ikki seta hjún skattliga verri fyri enn onnur, og at reglurnar undir tí uppskotnu skipanini meir enn annað eru at meta sum verndareglur, so ognarflyting millum hjún ikki uttan víðari fær skattligt árin.

Landsstýrið metir, at hetta uppskotið um broyting í hjúnabandsskattingini kemur ikki at viðføra landskassanum stórvegis kostnað, men ber av góðum grundum ikki til at koma við nakrari neyvari útrokning av árininum av broytingunum, tí ikki finnast beinleiðis skrásettir upplýsingar um hesi viðurskifti, tí tey ikki áður hava havt týdning fyri skattaskrásetingina.

Skatting av fiskimonnum

Seinastu tíðina hevur vertø gjørt nógv burturúr at samanbera skattatrýstið hjá okkum við grannalondini. Tað eru serliga føroyskir fiskimenn, sum hava fingið sær hýru í grannalondum okkara, tey seinastu árini, sum hava kært seg um skattin í Føroyum.

Um familjan er eftir í Føroyum, hava hesir verið undir fullari skattskyldu her. Úrslitið hevur tí mangan verið, at øll familjan er flutt av landinum fyri at fáa skattafyrimunin, sum útlandið gevur.

Tey lond, sum fiskimenn fyrst og fremst flyta til eru Noreg og Danmark. Tað verður sagt, at skatturin hjá fiskimonnum í hesum báðum londum er munandi lægri enn í Føroyum, og tí fáa menn við sama skipi og undir somu vinnuligum umstøðum annars lægri disponibla inntøku, um teir eru skattskyldugir í Føroyum og ikki í Noreg ella Danmark.

Ført verður fram, at arbeiðsveruleikin ikki verður havdur í huga, at arbeiðsfólk vilja setast javnt við tey, ið tey arbeiða saman við, ella við øðrum orðum, at tað verður gjørdur munur millum føroyingar sum búgva í Føroyum og norðmenn og føroyingar, sum teir arbeiða saman við í Noreg, og sum búgva har.

Hetta er orsøkin til at tleiri familjur eru fluttar úr Føroyum til Noregs og Danmarkar, men tá tað bæði er kostbart og óhagaligt at flyta millum lond, tá ein hevur familju, og tá serliga um familjan er stór og børnini hava nátt ein ávísan aldur, so skal sjálvandi tað eto fær tiggjarliga burturúr at flyta standa í ávísan mun til hesi viðurskiltti.

Tað er greitt, at tann staki hevur nógv lættari við at uppfylla kravið um flyting, so hann ikki verður skattaður í Føroyum.

Føroyskir fiskimenn uttanlands hava reist spurningin, um at javnstilla teir við fiskimenn í landinum teir arbeiða í. Ikki at teir vilja verða skattaðir í tí landinum teir arbeiða í, tá teir eru bósettir í Føroyum, men heldur at teir fáa ein frádrátt í inntøkum, sum minkar um skattliga munin millum teir og útlendsku fiskimennirnar, teir eru í vinnu saman við.

Samanbera vit skattin av einari fiskimannainntøku í Føroyum og í Noreg, so sær myndin soleiðis út:

DK.kr

Føroyar:	Inntøka			250.000,00 kr.
	Kommunuskattaprosent 23%			
	Kirkjuskattaprosent 0,25%			
	Galdandi landsskattatalva.			
Kommunuskattur 23% av 233.000		53.590,00 kr.		
Kirkjuskattur 0,25% av 233.000		582,00 kr.		
Landsskattur sambært talvu 1997.		61.570,00 kr.		115.742,00 kr.
Als+Am grunnurin, 3% av 250.000 kr.				7.500,00 kr.
Fall				123.242 (49,3%)

Verður kommunuskattaprosentið lækkað til 20, broytist samlaði skatturin frá 123.242 kr. til 116.252 ella 46,5%. Nógv tann størsti parturin av kommununum hevur eitt skattaprosent millum 16 og 20. Tí vil eitt kommunuskattaprosent upp á 20 geva ein rættari samanberingsgrundarlag.

Barnafrádráttur í skattinum 2.900,00 kr. (Land)

Barnafrádráttur í skattinum 2.500,00 kr. (Komm)

N.kr.

Noreg:	Inntøka			250.000,00 kr.
	Barnfrádráttur	23.300,00 kr.		
	Lægstakaraf. 20% max.	29.800,00 kr.		
	Limagjald	1.800,00 kr.		
	Fiskimannafr. 30% max.	70.000,00 kr.		124.900,00 kr.
	Skattskyldug inntøka			125.100,00 kr.
	I. Vanligur inntøkuskattur			
	28% av 125.100	35.028,00 kr.		
	II. Persónligur inntøkuskattur			
	1. Social gjøld			
	7,8% av lønini (250.000)			19.500,00 kr.

2. Eykaskattur		
5% av bruttoinntøku millum		
220.500 - 248.500	1.400,00 kr.	
13,7% av inntøku		
yvir 248.500	205,00 kr.	
Tilsamans (22,5%)		56.133,00 kr.

Barnafrádráttur í inntøkuni 1 barn, kr. 18.200, fleiri kr. 22.200
Norska skattaútrokningin er frá 1996, men tá fleiri upphæddir verða prístalsviðgjørdar, er hon eitt sindur broytt í 1997, men sum samanberingargrundarlag við føroysku skattaútroknuingina frá 1997 eru hon væl nýtulig.
Um føroyska inntøkan verður uppgjørd sum áður víst, men lækkað við 15%, samsvarandi lógaruppskotinum, gerst úrslitið hetta :

Føroyar: Inntøka kr. 250.000 - 15% = 212.500

Kommunuskattur (23%)	44.965,00 kr.	(20%)	39.100 kr.
Kirkjuskattur	488,00 kr.		488 kr.
Landsskattur	47.695,00 kr.	93.148 kr.	47.695 kr.
Als + Am.grunnurin 3% av 212.500		6.375 kr.	6.375 kr.
Ialt		99.523 kr.	93.658 kr.
Í % av 250.000 kr.		39,8%	37,5%

Hetta dømi gevur ein lægri skatt upp á 23.719 kr. við einum kommunuskattaprosentið upp á 23, og 22.594 við kommunuskattaprosentinum 20. Hóast hetta er ein stór lækking, so verður støðugt rættuliga stórur munur millum tey um. 22,5%, sum goldið verður í Noreg av sonu inntøku, og so upp til 39,8% sum goldið verður í Føroyum.

Um vit rokna við lægsta kommunuskattaprosenti (16%) í døminum omanfyri, vil samlaði skatturin + ALS og AM verða 85.838 kr. ella 34,3%, sammett við 106.932 (42,8%) áðrenn lækkingina av inntøkuni við 15%.

Samanbera vit føroysku inntøkuna (212.500 kr.) við Danmark verður munurin í skattinum ikki so stórur. Í Danmark verður latin ein frádráttur upp á 190 kr. "pr. hvedag på mindst 12 timer", sum tó verður avmarkaður til hægst 41.800 kr. um árið.

Í Íslandi verður eisini nýttur frádráttur pr. dag. Í løtuni er hann 671 kr. um dagin.

Onnur dømi: Landsskattatalva 1997, Kirkjuskattur 0,25.

..... Samlaðu skattur .....

	Kommuna 23%	Kommuna 20%	Kommuna 18%
Inntøka 250.000 kr.	115.742	108.752	104.092
Als + AM 3%	7.500	7.500	7.500
Ialt	123.242	116.252	111.592
Í % av 250.000	49,3%	46,5%	44,6%
Inntøka 250.000 - 15% = 212.500	93.148	87.283	83.373
Als + AM 3%	6.375	6.375	6.375
Ialt	99.523	93.658	89.748
Í % av 250.000	39,8%	37,5%	35,9%

Inntøka 200.000 kr.	85.617	80.127	76.467
Als + Am 3%	6.000	6.000	6.000
Falt	91.617	86.127	82.467
Í % av 200.000	45,8%	43,1%	41,3%
Inntøka 200.000 - 15% = 170.000	67.542	62.952	59.892
Als + AM 3%	5.100	5.100	5.100
Falt	72.642	68.052	4.992
Í % av 200.000	36,3%	34,0%	32,5%
Inntøka 180.000 kr.	73.567	68.677	65.417
Als + AM 3%	5.400	5.400	5.400
Íalt	78.967	74.077	70.817
Í % av 180.000	43,9%	41,2%	39,3%
Inntøka 180.000 - 15% = 153.000	57.300	53.220	50.500
Als + AM	4.590	4.590	4.590
Falt	61.890	57.810	55.090
Í % av 180.000	34,4%	32,1%	30,6%

Harafturat kemur, at veittur verður barnafrádráttur við millum 5.000 og 6.000 kr. pr. barn, alt eftir hvor kom munubústaðurin er. Rentustuðul við 48% av rentuútreiðslunum til bústað, telefonútreiðslustuðningur við 35 kr. pr. mynstradan dag, 50% av goldnum uppihaldspeningi o.a.m.

Samanumtikið kann sigast, at øll londini rundan um okkum hava ein serligan fiskimannafrádrátt. Orsøkirnar til at londini hava ein serligan frádrátt fyri fiskimenn eru ymiskar frá landi til land.

Í Noregi skal fiskivinnan kappast við oljuvinnuna um stórt sæð somu arbeidsmegi. Harfil kemur eisini, at í Noregi hava myndugleikarnir stóran áhuga í at varðveita eitt bústaðarmynstur, sum fer fólkið at standast í Norðurnoregi. Tað er eisini í norðara partinum av Noregi, at fiskivinnan er týdningarmiklasti vinnuvegur.

Hóast nógv onnur viðurskifti eisini skulu takast við í eitt sammeting, so skerts ikki burtur, at ovurstórur munur er í inntøkuni eftir skatt hjá einum føroyingi við einum útlendskum skipi og hjá teimum útlendingum, hann er á skipsdekki saman við.

Av eitt inntøku upp á 250.000 kr. rinda norskir fiskimenn 23-25%, danskir 30-32% og føroyingar gott 49%. Hetta hevur havt við sær, at fleiri fiskimenn luva valt at flyta av landinum, og tá serliga teir, ið ikki hava familju. Úrslitið er, at okkara egnu fiskifør hava trupult við at fáa nanning. Tann so smátt byrjandi oljuvinnan hevur eisini við sær hýrur og arbeiðstreytir, sum skjótt kunnu lótta fiskivinnuna.

Nakrar av teimum broytingum, sum skotnar verða upp í hesum uppskoti, eru ætlaðar til at hjálpa upp á hesi viðurskifti. Skotið verður upp at lækka fiskimannainntøkuna við 15%, áðrenn hon kemur til skattingar. Meiningin er, at av samlaðu hýrani skulu bert 85% avroknast um afturhaldsskipanina sum A-inntøka, meðan samlaða hýran skal útgjaldast sum forvunnin upphædd.

Skatturin verður síðan roknaður av hesi lækkaðu inntøkuni. Tað sama ger seg galdandi fyri gjaldið til arbeiðsloysistryggingina og aðrar grunnar v.m., sum nýta útgoldnu A-inntøkuna sum grundarlag at rokna avgjald av.

Harafturímóti verður lækkaða inntøkan ikki nýtt, tá lønjavningargrunnurin roknar stuðulin út eftir ymsu lógunum um minstuløn og annan stuðul til manningina í fiskiflotanum. Grundarlagið undir útrokningunum er bert samlaði fiskipartarin eftir avrokningunum frá bátinum/skipinum, men ikki lækkaður við 15%.

Landið og kommununurnar kunnu neyvan í løtuni bera kostnaðin av at gera eina skattaskipan fyri føroyskar fiskimenn, sum gevur teimum líka stórar skattligar fyrimunir, sum teir norsku hava, men samanborið við donsku skipanina skuldi tann, sum verður skotin upp her verið kappingarfør, og serliga um inntøkan fer upp um 250.000 kr.

Mett verður, at uppskotið kemur at kosta landskassanum 28 mió. kr. og kommununum 14 mió. kr., ella alt annað líka 42 mió. kr. tilsamans roknað út upp á samlaðu fiskimannainntøkuna í 1996, men við skattastigum fyri 1997. Tær kommunur, sum lutfalsliga hava flestu inntøkurnar frá fiskimonnum bera eisini lutfalsliga størsta kostnaðin.

Verður inntøkan lækkað við 20%, so vísa líknandi útrokningar, at landskassin missir 38 mió.kr. og kommununar 20 mió. kr.

Hóast hetta er stór upphædd, sum hert umfatar 4.600 skattaborgarar, so kunnu fleiri góðar orsøkir verða fyri at gera nevndu broytingar fyri hesar fiskimenn, tí sum frálíður kunnu tær koma at geva skattapeningin aftur, tí tær kunnu koma at forða fyri, at heilar familjur flyta av landinum í stórum tali - í staðin kunnu tær hava við sær, at fleiri av teimum, sum eru flutt flyta aftur til Føroyar.

Hartil kemur, at trupulleikin við at manna føroysk skip minkar. Kappingin hjá fiskivinnuni við eina møguliga komandi oljuvinnu vil verða hør. Kappingin kemur stórt sæð at umfata somu arbeiðsmegi, hvar oljuvinnan bæði í lønum og arbeiðstreytum uttan iva altíð kemur at hava munin. Henda kappingin kann skjótt hótta við at leggja fiskivinnuna lamna.

Lækkingin í skattinum hjá fiskimonnum, sum er skotin upp her, vil í ein ávísan mun kunna hjálpa fiskivinnuni í kappingini við ta spírandi oljuvinnuna um sonu arbeiðsmegi, men samanumtikið kann annars ikki siggast, at broytingin vil lækka nakað av týdningi um kostnaðarstøðið hjá fiskivinnuni, uttan tað, at har skipini sambært lóg skulu gjalda til ymiskar sosialar grunnar o.a.m. av útgoldnari A-inntøku, kemur hetta at verða av tí minkaðu lønini sambært § 60 1. stk. nr. 9).

Skatting av sjómonnum í langfarasigling

Manningin á skipum, sum eru skrásett í Donsku Altjóða Skipaskrásetingin (DIS) fær útgoldið nettohýru, sum A-skattur ikki verður eftirbildin í.

Manningin á skipum, sum er skrásett í Føroysku Altjóða Skipaskrásetingini (FAS) fær bruttohýruna útgoldna um eitt av landsstýrinum góðkent avrokningarstað, sum so avroknar A-skattin og rindar manningini nettohýruna. Landskassin rindar so eina ávísa prosentupphædd av skattinum aftur til reiðarvirkið.

Ein partur av okkara sjómonnum sigla eisini við skipum, sum ikki koma undir omanfyri nevndu skipanir. Tey, sum umsita hesar sjómenn, siga, at teir eru rættuliga fáir í tali, og tí kann einhvør skipan fyri teir lætt umsitast uttan nakrar stórvegis broytingar í teimum dagligu arbeiðsmannagongdum annars.

Fleiri av hesum monnum sigla við skipum innan oljuvinnuna. Hýran verður goldin í dollarum, og eftir hvat fleiri upplýsa, so stendur í teirra starvssáttmálum, at lønin ikki viðkemur triðjamonni, uttan at tað tó verður upplýst, um hetta eisini umfatar almennar mýndugleikar í heimlandinum.

Hesir persónar og aðrir, sum sigla undir sokallaðum hentleika fløggum, hava sett ynski fram um at fáa eina líknandi skattaskipan sum danska DIS-skipanin.

Hjá skattavaldinum krevur tað lutfalsligan stóra arbeiðsorku at finna fram til hesar persónar og skatta teir rímiliga. Flestu av teimum, sum funnið verður fram til, vísa aftur at geva inntøkuna upp, við tí úrslitið, at skattskylduga inntøkan verður mett. Onkur rindar skattin av slíkari mettari inntøku. Í teimum førum er hon nokk ikki ov høgt mett. Rættiliga óvist er eisini, hvussu stórur partur av slíkum inntøkum kemur til skatting.

Leysir persónar hava lættari við at sleppa sær undan at gjalda skatt í Føroyum av slíkum inntøkum, tí teir lættari kunnu flyta av landinum enn ein persónur við familju.

Nakrir av hesum persónum eru eisini fluttir av landinum til "bústaðir" uttan fyri ríkið, og kanska fleiri standa fyri at fara, eisini familjumenn, tí bert um teir flyta til Danmarkar, so fáa teir skattafyrimun av at sigla í "Udenrigsfart".

Skotið verður tí upp her at lækka skattin í Føroyum hjá frammanfyri umrøddu persónum. Grundirnar eru nevndar frammanfyri.

Skattavaldið skal nýta stóra arbeiðsorku fyri at finna fram til hesar inntøkur, sum í flestu førum tó ikki eydnast. Føroyingar, sum eru í hesari vinnu, vilja støðast í Føroyum og helst flyta fleiri heim aftur, um teir fáa ein rímiligan skan her, sum eftir teirra meting er, at teirra inntøka eftir skatt er nøkulunda tann sama, sum hjá teirra starvsfeløgum undir DIS-skipanini.

Hesar broytingar koma neyvan at kosta landi og kommunum nakað av týdningi, tí fyri tað fyrsta er í løtuni ringt at fáa slíkar inntøkur til skattingar. Verður skatturin á slíkum inntøkum lækkaður, kann heldur roknast við, at fleiri av teimum koma til skattingar her í landinum. Møguliga kann hetta geva eina størri skattauppheedd til Føroyar, enn vit fáa av slíkum inntøkum við verandi skattalýsti.

Kæra um álíkningina

Sum nakað nýtt verður nú eisini sett í lógina, at landsstýrismaðurin við kunngerð kann áseta gjaldfreist í sambond við kærur um álíkningina. Víst verður í hesum sambandi til viðmerkingarnar til kapittul 13.

Viðmerkingar til teir einstøku kapittlarnar

Viðmerkingar til Kap. 1, 2, 3 og 4

Flestu broytingarnar eru dagføringar av lóggávuni, so hon samsvarar við ábyrgdarbýti landsstýrismanna, sambært løgtingslóg nr. 103 frá 26. juli 1994 um stýrisskipan Føroya. Hvar ábyrgdin fyri at gera reglur og kunngerðir fyrr hevur ligið hjá Líkningarráð Føroya, verður henda nú løgd til landsstýrismannin í skattamálum, sum sambært nevndu lóg eisini hevur ovastu umsitingarligu ábyrgdina.

Broytingarnar nr. 1), 2), 10) og 15) eru ein fylgja av nýggju stýrisskipanarlógini, hvar myndugleikin, sum hevur ligið hjá Líkningarráð Føroya - ella í ávísum førum hjá samlaða landsstýrinum - verður fluttur til landsstýrismannin í skattamálum. Eisini er skattavaldið broytt til líkningarvaldið.

Viðmerkingar til broytingarnar í samskattingini millum hjún.

Lógarbroytingarnar, ið landsstýrið hevur skotið upp í hesum uppskoti, og sum hava til endamál at taka av alla samskatting millum hjún, kunnu stórt sæð býtast í tveir høvuðspartar, har ið annar viðvíkur álíkningini, og hin viðvíkur innheintanini av skattakrøvum.

Broytingarnar í lógini, ið eru skotnar upp sum nr. 3), 4), 5), 6), 7), 8), 9), 20), 22), 24), 49)-52) og 92)-94) eru soleiðis allar broytingar, sum saman við høvuðsbroytingin í nr. 3) eru við til at broyta skattalóggávuna frá verandi samskatting til sjálvstøðuga skatting av hjúnum, har ið uppgerðin av skaftaskyldugu inntøkum teirra og ognum teirra framyvir skal fara fram á líknandi hátt sum fyri ógiftar skattgjaldarar.

Í § 4 í broyting nr.3) er gjørd áseting um, hvussu farast skal fram í teimum førum, har tað talan er um inntøktir av ognum í hjúnabandinum ella inntøkur av sjálvstøðugum virkisvirki hjúnanna, tí hugsandi er, at í hesum førum kann vera nakað av ivamáli, hvør av hjúnunum í roynd og veru er rætti inntøkumóttakari ella eigari. Landsstýrið hevur í hesum sambandi skotið upp, at landsstýrismaðurin í skattamálum fær heimild at gera

neyvari reglur fyri hesi viðurskifti. Hesar reglur skulu sostatt verða gjørdar út frá teimum fyritreytum, sum lógin ásetir um inntøku- og ogntarbýli, og sum miðja ímóti at býtið skal svara til veruligu viðurskiftini, tað veri seg, tá talan er um at hjún bæði í felag reka vinnuvirki ella har, ið annar er settur í starv hjá hinum hjúnafelaganum.

Tær broytingar í lógini, sum eru skotnar upp sum nr. 49) 52) og 92) 94) eru broytingar í verandi innheintingar-, heftilsis- og pantingarreglum, sum í dag í mun til skattakrøv innihalda sekundera ábyrging millum hjún. Landsstýrið hevur við hesum broytingum skotið upp, at eisini hvat viðvíkur ábyrging fyri skuld hjá hvørjum øðrum verða borgarrættarligu reglurnar um ræði og heftan í hjúnalagnum gjøgnumførdar. Hetta viðførir, at frá og við skattakrøvum, ið stava frá álíkningini fyri 1998 verður ikki longur heimilað innkrevjingarvaldinum at innheinta hesi krøv við lønarafturhaldi hjá øðrum enn skuldaranum sjálvum. Ei heldur skal verða gjørligt at mótrokna í ágóða hjá hinum hjúnafelaganum og ikki skal verða gjørligt at partta í ogn hjá hinum hjúnafelaganum. Á hendan hátt kemur landskassin soleiðis at verða meir javnsettur við aðrar kreditorar, tá ið krøv skulu innheintast. Tann fyrimunur, sum landskassin sum kreditor hevur av at kunna krevja skattakrøv inn við lønareftirhaldi hjá skuldaranum sjálvum, verður tó varðveittur.

Fiskimenn og sjómenn í langfarasigling (Fiskimannaskatting):

Við § 25a verður ásett, at skattaskylduga inntøkan umborð á einum fiskifari er øll veiðiinntøkan, sum er løgd inn í peningi ella peningavirði. Undir veiðuinntøku kemur ikki studningur, minstaløn, minstaforvinningur o.a.m. Nevndu stuðlar verða skattliga viðgjørdir eftir vanligu reglunum í skattalógini.

Øðrvísi er tað, tá talan er um aðra tuntøku, sum ikki hevur beinleiðis samband við veiðuinntøkuna. Her kann verða talan um bjargingarløn, løn fyri sleið og annað. Um hetta ognast báti á veiðuferð, ella tá farið verður til hjálpar frá landi, so kemur inntøkan um. reglurnar í hesi grein.

Í stk. 2 verður ásett, at egning, sum serlig samsýning verður latin fyri, og verður gjørd av øðrum enn manningini knýtt at bátinum, verður ikki roknað sum veiðiinntøka. Upp til tveir av føstu manningini kunnu vera heimaegnarar, og skulu teir samsýnast á jøvnum føti við teir, sum eru úti við bátinum, t.v.s. part av veiðuinntøkuni. Tann samsýning manningin fær fyri at gera nýggja fiskiútgerð til, ella fyri at hjálpa til at røkja bátin, verður ikki roknað sum partur av veiðiinntøkuni, men sum inntøka á landi, og samsýningin til manningina er tí heldur ikki A-inntøka sambært § 60, stk. 1, nr. 9) í skattalógini, men A-inntøka sambært § 60, stk. 1, nr 1) í skattalógini. Rakstrarvinningur/halt av skiparakstri verður roknað sum inntøka á landi og skattað sambært vanligu reglunum í skattalógini.

Tá tað snýr seg um fiskiskip, sum royna á fjarðleiðum, størru línubátar og ísfiskatrolara v.m., sum royna á heimaleiðum, so er manningin mynstrað eftir sáttmála millum Føroya Reiðarafelag og viðkomandi yrkisfelag (sí stk. 3).

Um tað harafturímóti snýr seg um útróðrarflotan, so er tað eitt eyðkenni fyri hann, at her eru ikki einsgildandi hýrusáttmálar millum manning og bát, sum hjá mynstraðum fiskimonnum. Uttan mun til støddd, so kunnu vera heilt ymiskir sáttmálar millum manning og bát. Meginfelag Útróðrarmanna og Báta- og Skipaeigarar hava ein sáttmála frá 1984. Í løtuni eru teir við at gera nýggjan sáttmála, men ivasamt er, hvussu neyvt bátarnir fylgja slíkum sáttmála. Rættuliga ofta verður gjørd ein beinleiðis avtala millum manning og bátaeigarar, hvussu avroknast skal. Slíkar avtalur verða ofta gjørdar munnligu.

Hesi heldur óklóru sáttmálaviðurskifti gera, at tá veiðuinntøkan sambært § 25a o.a.m., sum skal avroknast manningini, verður gjørd upp, er neyðugt við nøkrum treytum ella avmarkingum.

Um manningin er mynstrað eftir sáttmálanum millum Føroya Reiðarafelag og viðkomandi yrkisfelag ella millum Meginfelag Útróðrarmanna og Báta- og Skipaeigarar, so er avrokningin til manningina eftir hesum

sáttmálum galdandi, tá hon lýkur treytirnar í stk. 4, nr. 1) og 2). Har ongin sáttmáli er, er treytin tann, at mynstrað verður, ella at fiskiparturin til manningina, verður avtaladur millum viðkomandi skipaeigara og viðkomandi persónar ella yrkisfelag teirra, sum lýkur treytirnar í stk. 4, nr. 1) og 2).

Meiningin við at avmarka hýruna til 45% av nettoveiðuni uppgjørd sambært stk. 4, nr. 1), er ikki at grípa inn í fría avtalurættin millum skip og manning. Sáttmálar millum skip og manning kunnu frítt avtalast, men í mesta lagi tann parturin av manningapørtunum, sum svara til avmarkingarnar ásettar í stk. 4, nr. 1) og 2) verða mettir sum A-inntøka sambært § 60, stk. 1, nr. 9). Hetta skuldi forðað fyri, at nakar roynir at spekulera í einum skattafyrimuni við at flyta størri part av nettoveiðini, sum A-inntøka sambært § 60, stk. 1, nr. 9).

Eisini verður tann treyt stillað til eigara av skipinum, at er hann við skipi, hann eigur ella eigur part í, skal hann javnstillast við hinar av manningini, og bert tann parturin av hansara hýru, sum verður gjørd upp eftir reglunum í stk. 3 og 4 í hesi grein, og sum skal verða hin sami uppgerðarháttur, sum hjá hinum av manningini, verður roknað sum A-inntøka sambært § 60, stk. 1, nr. 9).

Fyri at javnstilla allar fiskimenn, sum eru skattskyldugir í Føroyum, verður í stk. 6 ásett, at hýran hjá teimum, sum eru við fiskiskipum, sum ikki eru skrásett í Føroyum, lækkar við 15%, áðrenn hon verður skattað eftir galdandi skattalógum. Henda hýra er eftir galdandi skattalóg B-inntøka í Føroyum, men í praksis verður hetta gjørt soleiðis, at av tí avrokning, sum skal fylgja við sjálvuppgávuni, verða 15% drignar frá, og restin sett á sjálvuppgávuna. Tá fyribilsinntøkan verður skrásett fyrst í árinum, verður eisini tikið hædd fyri hesum.

Í stk. 7 er at enda ásett, at hýra frá skipum undir Føroyska Altjóða Skipaskránni verður skattliga viðgjørd eins og veiðuinntøka.

(Sjómenn í langfarasigling)
Reglan § 25 b víkur ikki frá høvuðsreglunni í § 25, har skattskylduga inntøkan er alt tað, sum hin skattskyldugi í árinum hevur lagt inn í peningi og peningsvirði, men her verður eisini kravt at inntøkan skal koma frá ávísum keldum. Her verður fyrst og fremst kravt, at skipið, sum inntøkan kemur frá, ikki er skrásett í Føroyum, og tað bert skal verða nýtt til vinnuliga flyting av farmi og/ella persónum. Hartil kemur, at inntøkan eisini umfatar hýru frá bjargingarskipum, sum ikki eru heimahoyrandi í Føroyum, og tænastur umborð á útlendskum skipum og øðrum útbúnaði, sum verður nýttur til rannsókn og úttøku av kolvetni uttan fyri føroyskt sjóøki.

Hýra, meðan skipið er til umvælingar ella er fyribils upplagt, verður eisini roknað sum hýra fyri tænastu umborð, uttan so er, at sjómaðurin bert er í tænastu umborð, meðan skipið liggur til umvælingar ella er fyribils upplagt.

Tá rætt verður um hýru umborð á skipi í Fas, DIS og í føroysku skipaskrásetingini verður meint við hýru, sum kemur undir § 25 í hesi lóg og ikki undir § 25b, stk. 1.

Í § 33, 13) verður ásett, at allir persónar, sum eru umfataðir av § 25b, stk. 1 kunnu lækka inntøkupa við niðanfyri vístu frádráttum, áðrenn ein skattur upp á 35% verður tikin av inntøkuni.

Fastur frádráttur í hýruni	50.000,00 kr.
+ 15% av hýruni upp til 200.000	30.000,00 kr.
+ 8% av restini upp til hægst 350.000	12.000,00 kr.
Hægsti árligi frádráttur	92.000,00 kr.

Prosentfrádrátturin verður altíð roknaður av hýruni, tá hon er umroknað til heilársinntøku, og í hvørjum inntøkuári sær kann hann hægst verða roknaður av einari heilársinntøku upp á 350.000 kr. Um ein persónur bert hevur hýru undir hesi skipan ein part av inntøkuárinum, verða bæði fasti frádráttur og prosentfrádrátt-

urin lækkaðir lutfalsliga. Hetta krevur, at dagatalið í árinum, ið viðkomandi er mínstraður í og fær sjómansinntøku, sum kemur undir § 25h, verður uppgivið. Hetta vil sjáldan verða trupult at fáa upplýst, tí hýrumvrokningin, sum skal nýtast sum prógv fyri at inntøkan, ið er uppgivin á sjálvuppgávuni, er rætt, eisini vísir talið á mínstringardøgum.

Dømi: Nýggj skipan samanborin við núverandi. Kommunuskattur + kirkjuskattur 23.25. Landsskattur: Landsskattatalva 1997.

			Skattur nýggj skipan	Skattur núverandi
Hýra		350.000		
Fastur frádráttur	50.000			
+ 15% av 200.000	30.000			
+ 8 % av 150.000	12.000	92.000		
Skattskyldug inntøka		258.000		
Skattur 35% av	258.000		90.300	175.000
Hýra		250.000		
Fastur frádráttur	50.000			
+ 15% av 200.000	30.000			
+ 8% av 50.000	4.000	84.000		
Skattskyldug inntøka		166.000		
Skattur 35% av 166.000			58.100	115.742
Hýra	200.000			
Fastur frádráttur	50.000			
+ 15% av 200.000	30.000	80.000		
Skattskyldug inntøka			120.000	
Skattur 35% av 120.000		42.000	85.617	
Hýra	180.000			
Fastur frádráttur	50.000			
+ 15% av 180.000	27.000	77.000		
Skattskyldug inntøka		103.000		
Skattur 35% av 103.000			36.050	73.567
Hýra		150.000		
Fastur frádráttur	50.000			
+ 15% av 150.000	22.500	72.500		
Skattskyldug inntøka		77.500		
Skattur 35% av 77.500			27.125	55.492

Her er ikki roknað við 3% gjaldi til Als og Am-grunnin.

– – – –

Dømi 2.

Inntøka á landi í Føroyum	50.000
Inntøka undir DIS	60.000
Onnur sjómansinntøka í 150 dagar	100.000
Samlað inntøka	210.000

Umroknað sjómansinntøka til ársinntøku:

(100.000 x 365/150) =	243.300	
Fastur frádráttur	50.000	
+ 15% av 200.000	30.000	
+ 8% av [243.300 - 200.000)	3.464	
83.464 x 150/365		34.300
Skattskyldug inntøka		175.700

Samlaði skatturin í Føroyum av 175.700 kr.

Kommunuskattur: 23,25 av 158.700	36.896
Landsskattur:	34.079
Ialt	70.975

Skattur av inntøku á landi: 70.975 x 50.000/175.700 =	20.198
Skattur á DIS inntøku: 70.975 X 60.000/175.700 =	24.237
Skattur á sjómansinntøku: 70.975 X 65.700/175.700 =	26.540
Ialt	70.975

At gjalda í Føroyum:

Skattur av inntøku á landi	20.198
Skattur av DIS	0
Skattur av aðrari sjómansinntøku:	
35% av (100.000 - 34.000)	22.995
Samlaður skattur á landi	43.193

Sjómansskattur í prosent av "Aðrari sjóinntøku" 22.995 x 100 = 23%
100.000

Her er roknað við, at skatturin av tí umroknaðu sjómansinntøkuni er 35%, sum verður býttur við 50% til kommununar og 50% til landskassan, sambært broyting í § 1, stk. 2.ásetingarlógini. Harafturat kemur, at veittur verður barnafrádráttur við millum 5.000 og 6.000 kr. pr. barn alt eftir hvør kommunubúsfaðurin er. Rentustuðul við 48% av rentuútreiðslunum til bústað, telefonútreiðslustuðningur við 35 kr. pr. mynstraðan dag til allar langfarasjómenn, 50% av goldnum uppihaldspeningi, ferðastuðul eftir ávísum reglum o.a.m.

Aðrar broytingar:

Við broyting nr. 23) verður m.a. skotið upp, at broyta reglurnar í § 33 nr. 12 um frádrátt fyri meirútreiðslur hjá skattgjaldarum, sum arbeiða uttanlands. Eftir verandi reglum verður frádrátturin veittur við eini upphædd, sum er ætlað at dekka tær faktisku útreiðslurnar. Við broytingini verður ásett, at frádráttur verður veittur fyri part av meirútreiðslunum og viðførir broytingin sostatt eini skerjing av teimi verandi frádráttarmøguleikum. Í uppskotinum verður heimildin til at áseta frádráttin løgd til landsstýrismannin í skattamálum.

Í broyting nr. 26) verður 1.oktober broyttur til 1. desember. Kommunalu íggjarætlanirnar, og harvið kommunalu skattaprosentini, hava hesi seinastu árini havt 1. desember sum skeringsdag. Hetta hevur ikki hindrað líkningarmyndugleikunum at gjørt tað fyritreikandi arbeiði í samband við innkrevjing og fyritilsskrá, sum skal verða avgreitt áðrenn ársskiftið; tí verður skotið upp at hava 1. desember sum skeringsdag til flytingar millum kommunur.

Broyting nr. 27) er ein fylgja av broyting nr. 26). Samstundis verður nágreinað, at tað er til kommununa, sum hevur fingið skattin, ið kærast skal til.
Í broyting nr. 30) verður álagt bygdarráðnum at áseta skattaprosentið í seinasta lagi 1. desember í staðin fyri sum nú í seinnu helvt av september.

Viðmerkingar til kap. 5 og 6

Broytingarnar nr. 31) til 35) fylgja av uppskotnu umleggingini av skattalýsingini, og svara stórt sæð til praksis í dag. Í staðin fyri at lata sjálvuppgávuna inn til kommununa, skal hon latast økisskrivstovuni í tí øki ein býr í, sum skrásetur hana. Hon verður síðani latin til økisskrivstovuna har atvinnan fer fram og álíkað har.

Í broyting nr. 34) er nágreinað, at kommunar hava rætt til skattin, men ikki til "at skattleggja". - Tað hevur sum kunnugt økisskrivstovan, sambært løgtingsmál nr.xx /1997: Løgtingslóg um Toll- og Skattalýsiting.
Í broyting nr. 37) er 1.oktober broyttur til 1. desember, sum er ein fylgja av broytingunum framtnanundan, hvar 1. desember verður valdur sum seinasti dagur at gera broytingar í.

Tá tað í § 60, stk. 1, nr. 9) verður áselt, at fiskipartar, sum verða gjørdir upp eftir § 25a og lækkaðir við 15%, verða mettir sum A-inntøka, ber tað í sær, at ymiskir grunnar v.m. sum nýta hesa A-inntøku sum grundarlag fyri avgjaldsútrokningini, eisini í framtíðini skulu nýta hesa minkaðu A-inntøku sum avgjaldsútroknингargrundarlag. Sum dømi kunnu nevnast Arbeiðsloysistryggingin, AM-grunnurin, Trygdargrunnurin fyri avreiðingar og lønir. Frítíðarlønin harafturfmóti verður ikki roknað av A-inntøkuni, men av samlaðu ársinntøkuni. Reiðarin/skipaeigarin, sum skal avrokna til slíkar grunnar av útgoldnari A-inntøku, skal eisini nýta A-inntøkuna sambært § 60, stk. 1, nr. 9).

Í § 63, stk. 2 verður lagt aftrat, at tá A-inntøkan, sambært § 60, stk. 1, nr. 9), verður útgoldin skattgjaldara, skal hann samstundis hava útguldið tey 15% av hyruni, sum ikki verða roknað sum A-inntøka, og at landsstýrið ásetir nærri reglur um avrokningarháttin.

Mannagongdin verður nokk tann, at reiðarin skal ávísa samlaða fiskipartin um tað av landsstýrinum góðkenda avrokningarstaðið sambært stk. 1. Hann ávísur 85% av fiskipartinum sum "A-inntøka" og samlaða fiskipartin sum "Forvunnin upphædd". Sama ger seg galdandi fyri frítíðarpening. Frítíðarpeningurin verður roknaður út, sambært frítíðarlógina, av einum fiskiparti. 85% verða ávíst sum "A-inntøka" og samlaða frítíðarlønin sum "Forvunnin upphædd.

Í broyting nr. 40) verður eisini í § 63, stk. 4, 3. punktum givið landsstýrismanninum heimild til við kunngerð at áseta krøv til skjalprógv í sambond við útvegan av sokallaðum fyribils P-tali, heldur enn at verða tilmeldaði fólkayvirlitinum. Eitt fyrbils p-tal sigur líkningarvaldinum einki um persónin. Líkningarvaldið sær, nær han hevur biðið um P-talið, og nær seinasta lønin er komin um allurhaldsskipanina, men tað sær ikki, nær viðkomandi eitt nú fer úr Føroyum. Ein persónur úr eintom norðanlandi kann uppihalda sær í einum øðrum norðanlandi í upp til 6 mánaðar uttan at skráseta seg í fólkayvirlitinum. Hetta kann hann bert gera, um hann ikki arbeiðir sum løntakari, tí annars skal øll løn flytast við einum P-tali. Tá skal heimild vera til at avgera, um hann skal skráseta seg hjá fólkayvirlitinum, ella hann kann fáa eitt fyribils p-tal. Á hesum øki er uppbeidd ein føst venja, sum eigur at verða feld niður í eina kunngerð.

Annars er í hesum kapitlum, sum í teimum frammanundan, stórur partur av broytingunum ein fylgja av nýggju stýrisskipanarlógini, hvar myndugleikin, sum hevur ligið hjá Líkningarráð Føroya, ella í ávísum førum orðini skattavaldið og líkningarmyndugleikin v.m. broytt til líkningarvaldið v.m.

Viðmerkingar til kap. 7, 8 og 9

Í broyting nr. 54 verður áseð at kap. 7, 8 og 9 verða settir úr gildi. Verandi reglur, ið hesum kapitlum fevna um skipan og starv kommunala líkningarvaldanna, Líkningarráðið og Landsskattanevndina. Í sambond við at skotið verður upp at gera nýggjan bygnað fyri skattafyristingina, eru hesar reglur allar samlaðar í upp-

skotinum til løgtingslóg um Toll- og Skattafyristing, og eru reglurnar samstundis nakað broyttar, sí viðmerkingarnar til nevnda lógaruppskot.

Viðmerkingar til kap. 10

Sum er skulu øll skattskyldug lata inn sjálvuppgávu. Letur skattgjaldari ikki inn sjálvuppgávu, verður hann mettur til skatt eftir reglunum í grein 104 í galdandi skattalóg. Skattgjaldari, ið fær boð um, at hann er vorðin mettur til skatt, hevur í fall at inntøkan er sett ov lágt, skyldu at gera vart við seg hjá líkningaravdeildini í seinasta lagi 4 vikur frá tí hann hevur fingið boð um metingin. Letur ein ikki við seg koma, hóast inntøkan er sett ov lágt, og tað seinni kemur fram, at metingin er ov lág, verður í dag farið fram eftir reglunum í grein 106 í galdandi skattalóg, ið hevur við sær, at skatturin í slíkum førum verður bækkaður til at verða tað tvífalda av skattamunitinum millum meting og framkomnu upplýsingarnar.

Lógarbroytingarnar, ið gjørdar verða í kap. 10., § 100 til og við § 101, og deils eisini í kap. 13, byggja á uppskotið um at automatisera flest møguligar sjálvuppgávur/skattauppgerðir, soleiðis at skyldan til at lata inn sjálvuppgávu í stóran mun fellur burtur fyri løntakarar, og at løntakarar skulu kunnu fáa skjóta og rætta skattauppgerð uttan at lata inn sjálvuppgávu. Eftir uppskotinum skal líkningarvaldið í framtíðini - grundað á tey tøl tað hevur um skattaviðurskiftini hjá einum løntakara uttan at sjálvuppgáva er latin inn - lata hesum skattauppgerð so skjótt sum gjørligt eftir, at skattaárið er lokið.

Fyritreytin fyri at slík skipan kann fremjast, er sjálvsagt, at skattvaldið frammanundan á ein ella annan hátt hevur skrásett ella hevur atgongd til teir upplýsingar, ið neyðugir eru fyri at kunna gera eina rætta skattauppgerð.

Grundarlagið hjá Toll- og Skattstovuni fyri at rokna út skattin verður fyribilsskattakrásetingin og tað, sum Toll-og Skattstovan annars hevur skrásett um persónin frá fólkayvirlítinum v.m.

Skipanin viðførir, at líkningarvaldið fyrst í árinum skrivar út skattauppgerð fyri farna árið, grundað á hesar upplýsingar, og upplýsingar um skatuskyldu (full ell avmarkað), tíðarskeiðið, hann er skattskyldugur í og í hvørjari kommunu.

Um skattgjaldari, ið fær skattauppgerð, uttan at hava latið inn sjálvuppgávu, meinar, at tølini samsvara við teir veruligu upplýsingarnar um hansara skattligu viðurskifti fyri avvarandi ár, er ikki neyðugt hjá honum at lata inn sjálvuppgávu. Men um skattgjaldarin sær/veit, at upplýsingarnir ikki eru rættir ella at upplýsingar mangla, hevur hann skyldu til at lata inn broytingarskjal/sjálvuppgávu við neyðugu upplýsingunum til Toll- og Skattstovuna, so skattuppgerðin kann rættast. Oyðiblaðið til sjálvuppgávu verður at fáa á Toll-og Skattstovuni, Gjaldstovuni, Almannastovuni, á øllum posthúsum, peningastovnum og øðrum almennum stovnum, sum borgararnir hava nógv samskifti við.

Um sjálvuppgávu ella rættingar til uppgerðirna frá líkningarvaldinum ikki verða innlatnar, áðrenn freistin at lata sjálvuppgávu inn er úti, er hetta at meta sum ein fráboðan frá skattgjaldaranum um, at upplýsingarnir, ið líkningarvaldið hevur nýtt í uppgerðini, eru teir, ið skattgjaldarin upplýsir eiga at leggjast til grund fyri skattaálíkningi. Konsekvensurin av hesum er, at fráboðaða skattauppgerðin stendur við, og at skattgjaldarin annars á allan hátt verður viðgjørdur sum um sjálvuppgáva varð innlatin við nevndu upplýsingum - tó so at brot á hesar reglar verða revsað eftir serligari reglu, ið er intsett sum grein 139 A.

Hetta merkir samstundis eisini, at um seinni verður komið eftir, at skattgjaldarin ikki hevur latið við seg koma, hóast teir av líkningarvaldinum nýttu upplýsingar ikki vóru rættir, og skattsetingin orsakað av hesum er ov lág, at skattgjaldarin kann koma undir revsiábyrgd eftir reglunum í grein 139 A, tí skattgjaldarin við ikki at halda skyldu sína á hendan hátt leiðir líkningarvaldið til at nýta skeivar upplýsingar, sum grundarlag fyri skattsetingini.

Hvat viðvíkur reglunum, ið nevndar eru frammanundan um tvífaldan skatt eftir grein 106, tá ið metingin verð ov lág, so verður hendan grein sett úr gildi, og koma hesir tilburðir eins og allir nýggir, ið kunnu verða við skattgjaldara, sum ikki letur sjálvuppgávu/rættingar inn til Toll- og Skattstovuna, hóast hann sambært nýggju reglunum hevur eina fráboðunar-/rættingarskyldu, at verða viðgjørd eftir reglunum í grein 139 A. Skattgjaldari, ið á hendan hátt fær skattauppgerð uttan at hava latið inn sjálvuppgávu, fær eina 4 vikurs freist at gera vart við seg við nøguligum rettingum, men verður hendan freistin tó í fyrsta lagi at rokna frá, at freistin at lata inn sjálvuppgávu varð úti.

§ 104 verður munandi broytt. Nú verður bert sagt, at um sjálvuppgávan ikki verður latin inn rættstundis, verður skattskylduga inntøkan sett til eina metta upphædd, sum Toll- og Skattaráðið hevur heimild at fyriseta neyvari reglur fyri. Er sjálvuppgávan latin inn minni enn 7 dagar ov seint, verður samanlagdi inntøkuskatturin hækkaður við 2%, og 7 dagar ella meira ov seint við 5%, tó ongantíð meira enn kr. 5.000.

Landsstýrismaðurin í skattamálum kann í ávísum førum eftir tilmæli frá stýrinum lina ella heilt strika hesar hækkingar og tær, sum verða álagdar sambært § 119, tá søkt verður um tað.

Í § 105 er nú tann broyting hend, at landsstýrismaðurin í skattamálum ásetir reglur um longda freist at lata inn sjálvuppgávu.

Viðmerkingar til kap. 11 (§110 og § 111)

Sum nú er, lata øll, sum eru undir skattskyldu, inn ognaruppgerð. Frammanundan er umrøtt virðið av hesi uppgerð.

Sum nú er, lata peningastovnar v.m. allar upplýsingar um innistandandi, skuld, rentuinntøkur og rentuútreiðslur til Toll-og Skattstovuna. Tá hesir upplýsingar eru skrásettir frammanundan er ongin grund til at biða um teir aftur, og skráseta teir einaferð afturat.

Allar ognaruppgerðir pr. 31/12-1996 kunnu skrásetast, tí tær hava líkningarmyndugleikarnir, so neyðugt skuldi bert verið at skrásett broytingar, sum henda árliga eftir hesa tíð.

Tí verður sum broytingar í kap. 11 í greinunum 110 og 111 skotið upp, at øll tey, ið ikki hava skyldu at føra bókhald, bert lata inn ognaruppgerð, um so er, at broyting hevur verið í árinum í ávísum ognum og rættindum, sum nevndar eru í lógini. Tó skulu skattskyldugir, sum á fyrsta sinni lata inn ognaruppgerð, gera tað, síðani koma teir eisini undir somu skipan, sum nevnd er frammanfyri.

Í Føroyum skattskyldugur persónur, sum eigur ognir uttanlands av slíkum slag, sum er umrøtt í lógini, skal altíð lata inn ognaruppgerð.

Toll- og Skattstovan kann tó altíð áleggja einum skattaborgara at lata inn fullfíggjaða ognaruppgerð, tá hetta verður hildið neyðugt, fyri at fáa greiðu á serliga truplum og margbroyttum málum.

Eisini er uppskot um, at landsstýrismaðurin í skattamálum við kunngerð ásetir, hvørjar reglur skulu verða nýttar, tá meting av ognum verður gjørd. Skotið verður til upp, at § 111 verður broytt í hesum sambandi. Reglurnar í greinini eru ótíðarhóskandi, og geva ikki nakra samlíka mannagongd um, hvussu ognir av sama slag ymiskar staðir í landinum skulu metast. Hetta ger, at ognaruppgerðin í sínum núverandi líki ikki er álítandi. Mett verður eisini, at slík ognaruppgerð, sum skotin verður upp her, er nýtulig, tá ræður um rættleikan í álíkningini.

Viðmerkingar til kap. 12 (§ 118)

Sum er, skulu ávísingarskyldugir á hvørjum ári lata líkningarvaldinum yvirlit yvir m.a. útgoldnar lønir í árinum, hvønn løninar eru goldnar til og í hvønn mun hvør av teirra starvsfólkum fær frían ágóðar frá virkinum.

Fyri størsta partin av hesum upplýsingum er talan um upplýsingar, ið líkningarvaldið hevur frammanundan, og verður tí á líknandi hátt sum við sjálvuppgávum og ognaruppgerðum mett, at gjørligt er at automatisera stóran part av arbeiðinum, sum í dag fer til viðgerð av innlatnum upplýsingum frá ávísingarskyldugum, sum líkningarvaldið hevur frammanundan. Um tann partarin av hesum upplýsingum, ið ikki hevur viðgerð fyri neyðini, kann vera gjørdur meir automatiskur, so at líkningarvaldið letur ávísingarskyldugum yvirlit yvir, hvørjir upplýsingar eru skrásettir fyri virkið fyri farna árið, skuldi hert verið neyðugt at lingið inn upplýsingar frá ávísingarskyldugum, um teir hava ískoytir ella rættingar til upplýsingarnar frá líkningarvaldinum.

Í § 118, stk. 9 verður tí skotið upp, at fritaka ávisingarskyldugar fyri upplýsingarskylduna eftir í § 118 í tann mun yvirlitið, ið líkningarvaldið letur ávísingarskyldugu, inniheldur allar relevantar upplýsingar um virkið. Ávísingarskyldugi skal samanbera upplýsingarnar frá líkningarvaldinum við sínar egnu roknskapir um ávísingarskyldugar lønir og aðrar samsýningar. Er ikki samsvar, skal hann biða frá beinanvegin, t.v.s. um teir av líkningarvaldinum nýttu upplýsingar ikki eru rættir og fullgóðir. Reglurnar í § 141, stk. 1, nr.3 eru eisini galdandi í hesum føri.

Grundað á trupulleikar við at fáa neyðugar upplýsingar á pensiónsøkinum, verður í broyting nr. 85) skotið upp at víðka skylduna eftir § 124 til eisini at umfata Almannastovuna.

Aðrar broytingar eru ein fylgja av nýggju stýrisskipanarlógini, har myndugleikin, sum hevur ligið hjá Líkningarráð Føroya ella í ávísum førum hjá samlaða landsstýrinum, verður fluttur til landsstýrismannin í skattamálum. Eisini er skattavaldið og líkningarmyndugleikin í fleiri førum broyttur til líkningarvaldið. Tað satna ger seg galdandi í teimum seinastu kapitlunum í hesi lóg.

Viðmerkingar til kap. 13

Hvat broytingini í § 135, stk. 4 viðvíkur, verður víst til: Viðmerkingar til broytingarnar í samskattingini millum hjún frammanfyri.

Í § 138 er skoytt uppí sum stk. 2. at landsstýrismaðurin í skattamálum kann áseta reglur um gjaldfreist í samband við at ein skattaborgari kærir um skattsetingina. Meiningin við hesum er, at tá ein skattaálíkning verður kærd til skattakærunevndina ella landsskattakærunevndina, kann ein umsókn verða latin inn um suspensión av gjaldfreist við skattgjaldingini og møguligum morarentum av tí skyldugu upphædd, sum kært verður um.

Her skal tó bert verða talan um skyldugan skatt og morarentur, sum er álagdur, tá endaliga ársuppgerðin er gjørd, og sum ikki er goldin, tá søkt verður, og sum hevur samband við hækkingina, sum kært verður um.

Viðmerkingar til kap. 14

Sum nýggj áseting verður skotið upp, at seta inn § 139 A, sum er revsireglan í teim førum, har ið skattgjaldari, ið av líkningarvaldinum er settur ov lágt í skatt, við vilja ella av grovum ósketni ikki letur líkningarvaldinum neyðugu upplýsingarnar til at fremja eina rætta skattseting.

Nevndu neyðugu upplýsingar kunnu m.a. verða upplýsingar, sum eru rættingar av teim upplýsingum, ið líkningarvaldið hevur nýtt, men fevnir eisini um skylduna hjá skattgjaldara at upplýsa um innlatsku, ið líkningarvaldið ikki hevur skrásett.

4 vikurs freistin, ið er ásett í stk. 1 verður í høvuðsheitinum roknað frá móttøku av fráboðanini, men tó í fyrsta lagi frá at freistin at lata inn sjálvuppgávu gekk út. Hvat viðvíkur móttøku av fráboðanini verður gingið út frá, at skattgjaldarin hevur móttikið fráboðanina, um fráboðanin er viðgjørd og send í samsvari við vanligu mannagongdina hjá líkningarvaldinum. Hetta skal eisiti samanbaldast við, at allir skattgjaldarar hava kunnleika til, at teir eiga at móttaka sjálvuppgávu ella skattauppgerð fyri 15. mars, og um skattgjaldari ikki

hevur móttikið sjálvuppgávu ella skattauppgerð, er tað skattgjaldaranum greitt, at nakað er galið, og frítekur hetta ti ikki skattgjaldaran frá at seta seg í samband við líkningarvaldið um skattaviðurskifti síni.

Ásetingarnar í grein 139 A fevna eisini um teir tilburðir, ið kunnu uppstanda við at eitt nú upplýsingarnir, ið líkningarvaldið hevur fingið um útreiðslur, ikki eru rættir. Skattgjaldarin, ið tá hevur eina fráboðanarskyldu, kann koma undir revsing eftir reglunum í hesi grein í tann mun tað má metast at verða við vilja ella av grovum ósketni, at hann ikki rættar frádráttarupphæddina.

§ 139 B er áseting, sum fevnir um tey tilfeldi, sum ikki koma inn undir § 139 A, eitt nú tá ið skattgjaldari ikki fær tilsent hvørki sjálvuppgávu ella uppgerð, tí hann, sum kravt er, ikki fetur seg skráseta ella frámeldar seg sum búsitandi í Føroyum, hóast hann hevur bústað her, og hetta er gjørt við ti í hyggju at koma sær undan skatti.

Viðmerkingar til kap. 15

§ 152 verður strikað, ti kommunalu líkningarmyndugleikarnir eftir hesi lóg ikki hava ábyrgdina av skattaálíkningini.

§ 154, stk. 1 og § 155 verða strikað, og í § 154 verður sett nýtt stk. Heitnildin at góðkenna tvískattasáttmálar við onnur lond verður við hesum løgd til Føroya Løgting, og ikki til landsstýrismannin í skattamálum ella samlaða landsstýrið.

Ein nýggj § 157A gevur landsstýrismanninum í skattamálum heimild til at lata Toll- og Skattafyrisitingina taka avgerðir eftir hesi lóg.

1. viðgerð 8. desember 1997. Uppskotið varð beint í fíggjarnevndina, sum 22. desember 1997 legði fram soljóðandi:

Álit

Málið er lagt fyri løgtingið 2. desember 1997 og eftir 1. viðgerð 8. desember 1997 beint í fíggjarnevndina. Nevndin hevur viðgjørt málið og hevur undir viðgerðini havt fund við landsstýrismannin í skattamálum, Annfinn Kallsberg, og umboð fyri skattaumsitingina.

Meirlutin (Suni Jacobsen, Eydun Videro, Ernst Hansen, Tordur Niclasen og Finnbogi Arge)tekur undir við uppskoti landsstýrisins, men heldur, at partur av arbeiðsinntøku, sum er omanfyri kr. 500.000,- árliga, ikki fær frádrátt. Uppskot um hetta verður sett fram inman 2. viðgerð byrjar.

Tordur Niclasen hevur annars hesar viðmerkingar:

Umframt tekniskar broytingar og broytingar orsakað av nýggju stýrisskipanarlógina, so hava broytingarnar viðvíkjandi skatting av hjúnum og skatting av fiski-og sjómonnum verið nógv umrøddar.

Tað er ein sannroynd, at tað at liva í hjúnabandi nú í nógv ár hevur havt skattligar negativar avleiðingar við sær. Ja, beinleiðis hevur tað loyst seg skattliga ikki at giftast, men heldur at liva saman sum ógift.

Miðflokkurin tekur undir við yvirlýsingini hjá ST, har m.a. sagt verður: " Familjan er tann náttúrligi og grundleggjandi eindarbólkurin og hevur krav uppá verju og stuðul samfelagsins og landsins."

Vit ásanna, at familjan er hornasteinurin í samfelagnum, og at lóggávan má verja heimið - og at hjúnalagið er Gudgivni hátturin fyri samlivi millum mann og kvinnu.

Lóggávan eigur tí eisini at stuðla hesi skipan.

Hetta var m.a. orsøkin til, at vit á sinni løgdu dent á at fáa við í samgonguskjalið frá 30.08.94, at *"hjún ikki skattliga verða fyri vanbýti"*, og ***"at arbeitt verður fyri at fremja broytingar í skattalógini við atliti til, at hjúnafelagar í ávísan mun kunnu býta inntøkuna sundur sínamillum."***

Nevnda samgonguskjal var eisini undirskrivað av Sambandsflokkinum og Fólkaflokkinum.

Miðflokkurin hevur mangan víst á týdningin av einum miðvitsum familjupolitikki, og hava vit tí fleiri ferðir roynt at fáa løgtingið at gera broytingar í skattalógini soleiðis, at hjúnafelagar í *"ávísan mun kunnu býta inntøku sundur sínamillum."*

Tíanverri mega vit ásanna, at higartil hevur viljin ikki verið til staðar at fáa heint burtur henda mismun, sum galdandi skattalóg ger móti familjum, har annar hjúnafelagin ynskir at arbeiða heima, men sleppur tað ikki av skattaávum!

Tað almenna veitir eini barnafamilju, har bæði foreldrini arbeiða úti, eitt nú barnaansing, sum kostar hinum almenna umt. 40.000 kr um árið pr. barn á stovni. Men hjún, har annar hjúnafelagin arbeiðir heima, fáa ikki líknandi sømdir og eru fyri fíggjarligum vanbýti av at ansa sínum egnu børnum heima. So her gerst almenna diskrimineringin móti barnafamiljunt við einari inntøku enn støri.

Taka vit eitt dømi um skattligu diskrimineringina av hjúnum, har talan er bert um ta einu inntøkuna, í mun til har sama inntøka er forvunnin av tveimum, ið liva saman ógift, er hóskandi at nýta dømi, ið alment hevur verið frammi fyri tíð síðan.

Roknistykki sá soleiðis út, har tað almenna rindaði tilskot til barnaansing:

	Bæði arbeiða	Maður arbeiðir	Munur
Skattskyldug løn hjá manni	120.000	240.000	
Skattskyldug løn hjá konu	120.000		
Skattskyldug løn tilsamans	240.000	240.000	0
Skattur & ALS fyri mann og konu	67.000	92.600	
Tøk løn til familjuna	173.000	147.400	25.600
Gjald til vøggustovu/barnagarð (Foreldur gjalda 30%)	33.600	0	
Eftir til familjuna tá stovnsplássið er goldið	139.400	147.400	
Skattur til land og kommunu	67.000	92.600	
Tilskot til stovnspláss(30 % Kommuna og 40% Land)	78.400	0	
Eftir til land og kommunu	**-11.400**	**92.600**	**104.000**

Sambandsflokkurin eins væl og Fólkaflokkurin hava áður víst seg at taka undir við sjónarmiðum okkara um at koma hesi skattligu diskriminering av hjúnum til lívs.
Tí harmast vit nú, at hesir báðir flokkar sitandi í samgongu tykjast trekir og ikki vísa vilja at gera nakað munagott við hetta skattliga órættvísi, sum høtt, vildi verið eitt munagott familjupolitiskt tiltak.

Miðflokkurin fer framhaldandi at virka fyri, at fáa fram nevnda familjugagnliga tiltak. Álitið er ikki undirskrivað av Jóannes Eidesgaard og Finnboga Ísakson.

2. viðgerð 27. december 1997. Løgtingsmenninir Sjúrð Jacobsen, Eydun Videro, Ernst Hansen, Tordur Niclasen, og Finnbogi Arge løgdu fram soljóðandi:

Broytingaruppskot

Viðmerkingar
Sum fráboðað í áljtinum frá meirlutanum í figgjarnevndini, so heldur meirlutin, at parturin av hýrum, sum er oman fyri hálva mió. kr. árliga, ikki eigur at hava frádrátt.

Landsstýrismaðurin í figgjarmálum hevur á fundi greitt frá, at tílík áseting ikki kann setast í verk nú. Meirlutin heldur tí, at landsstýrismaðurin í kunngerð kann avmarka frádráttin heilt ella partvis, og setir tí fram hetta broytingaruppskot:

Í pkt. 38) verður skoytt uppí nr. 9 "Landsstýrismaðurin í skattamálum kann tó í kunngerð áseta, at tann parturin av fiskipartinum, sum er hægri enn 500.000,- verður ikki lækkaður. Landsstýrismaðurin kann somuleiðis í kunngerð áseta, at reglan í 2. pkt. einans er galdandi fyri fiskimenn, sum eru mynstraðir við fiskifari skrásett í Føroyum ella einans fyri fiskimenn, sum eru mynstraðir við fiskifari, sum ikki er skrásett í Føroyum.

"Broytingaruppskot til § 1, pkt. 38, samtykt 15.8.3. § 1 soleiðis broytt, samtykt 17-5-4. §§ 2 og 3 samtyktar 17-5-4. At málið soleiðis samtykt kundi fara til 3. viðgerð, samtykt 17-6-3.

Sambært § 85 í tingskipanini verður samtykt at víkja frá tíðarfreistini millum 2. og 3. viðgerð 18-0-4.

3. viðgerð 30. december 1997. Løgtingsmenninir Suni Jacobsen, Eydun Videro, Ernst Hansen, Jordur J. Nielsen og Finnbogi Arge, løgdu fram soljóðandi

Broytingaruppskot

1) Í pkt. 38) verður orðið "fiskipartinum" broytt til "inntøkuni frá fiskiskapi".
2) Í pkt. 64) verður "1)-6)" broytt til "1)-4)".

Viðmerkingar
ad 1):
Verandi orðing kann misskiljast, tí orðið "fiskipartur" merkir í veruleikanum "manningarpartur". Ætlanin við uppskotinum er, at tað skal fevna um alla inntøkuna, íroknað møguligar yvirmannapartar. Uppskotna broytingin tekur hædd fyri hesum.

ad 2):
Landstýrið hevur gjørt vart við, at í uppskotinum er ikki tikin hædd fyri, at sambært sama uppskoti eru pkt. 5 og 6 í § 110 stk. 3 strikað, og eiga tey tí ikki at vera nevnd í uppskotinum til nýggja § 111.

Broytingaruppskot til pkt. 38 og pkt 64 samtykt 17-8-0. Uppskotið, soleiðis samtykt við 2. viðgerð og broytt við 3. viðgerð, samtykt 16-9-0.

Løgtingslóg nr. 168, 30. december 1997.
EL. j. nr. 2540-5/91

27 Uppskot til løgtingslóg um Toll- og Skattafyrisiting

Ár 1997 týsdagin 2.desember, legði Anfinn Kallsberg, landsstýrismaður, vegna landsstýrið fram soljóðandi:

Uppskot
til
løgtingslóg um Toll- og Skattafyrisiting

Kap. 1
Toll- og Skattstova Føroya
Stýrið

§ 1. Toll- og Skattstova Føroya er fyrisitingarliga skipað undir landsstýrismanninum í skattamálum við einum Stýri og økisskrivstovum úti um landið. Stýrið ansar eftir, at skattaálíkningin og toll-og avgjaldsfyrisitingin fer fram á rættan og samlíkan hátt um alt landið.

§ 2. Stýrið ger hvørt ár eina virkisætlan fyri alt landið, sum økisskrivstovurnar hava skyldu at fylgja, og hevur Stýrið eftirlit við at ætlanin verður fylgd.
Stk. 2. Stýrið gevur økisskrivstovunum vegleiðingar viðvíkjandi skattaálíkningini og toll-og avgjaldsfyrisitingini, og hava tær skyldu at fylgja hesum vegleiðingum.
Stk. 3. Toll- og Skattaráð Føroya skal góðkenna tær vegleiðingar, sum umrøddar eru í stk. 2.

§ 3. Stýrið hevur skyldu til, tá tað heldur tað vera neyðugt, at kanna rættleikan í teimum avgerðum økisskrivstovan hevur tikið.
Stk. 2. Stýrið hevur altíð rætt til at fáa allar upplýsingar um ítøkiligar avgerðir, sum økisskrivstovurnar hava tikið. Eisini hava umboð fyri Stýrið rætt til at luttaka á fundi við tær kommunalu skattakærunevndirnar, tó uttan atkvøðurætt.
Stk. 3. Stýrið kann altíð taka skattaálíkningina hjá einum borgara upp aftur, tá tað metir hetta vera neyðugt. Eisini kann Stýrið altíð gera eina skattaálíkning, har ein slík ikki er gjørd áður. Um Stýrið heldur, at ein skattaálíkning ella onnur avgerð tikin av økisskrivstovuni ikki er bein, kann Stýrið altíð broyta skattaálíkningina ella avgerðina.
Stk. 4. Reglurnar í stk. 3 eru ikki galdandi, tá ein kommunal skattakærunevnd, Toll- og Skattaráð Føroya ella Landsskattakærunevndin hevur gjørt úrskurð í málinum, uttan so at nýggir upplýsingar eru komnir fram í málinum.
Stk. 5. Um Toll- og Skattaráð Føroya heldur, at ein avgerð, sum er tikin av einari kommunalari skattakærunevnd, ikki er bein, kann tað eftir tilmæli frá Stýrinum innan 4 vikur aftaná avgerðin er tikin leggja hana fyri Landsskattakærunevndina.
Stk. 6. Stýrið kann áleggja økisskrivstovunum at gera skattaálíkningar, har slíkar við órætti ikki hava verið gjørdar áður. Somuleiðis kann Stýrið áleggja økisskrivstovunum at áleggja toll- og avgjøld, har slík við órætti ikki hava verið áløgd áður.
Stk. 7. Tey, sum eru sett í skatt eftir avgerð stýrisins, ella sum Stýrið hevur broytt skattaálíkningina hjá, kunnu kæra avgerðina hjá Stýrinum til Landsskattakærunevndina, og skal slík kæra verða send skrivliga innan 4 vikur eftir tað, at tey hava fingið boð um avgerð stýrisins. Somuleiðis kunnu tey, sum Stýrið hevur álagt toll- og avgjøld, kæra til ávikavist Toll-kæru- ella Meirvirðisgjaldskærunevndina. Kæran skal verða send skrivliga innan 4 vikur eftir tað, at tey hava fingið boð um avgerð stýrisins.
Stk. 8. Skal skattseting verða hekkað eftir ætli, má hetta tó verða gjørt áður enn 2 ár eru liðin frá tí, at skattaárið gekk út. Áðrenn skattaálíkning verður broytt, skal skattgjaldarin fáa høvi til skrivliga at gera sínar viðmerkingar til skattsetingina.

Kap. 2
Økisskrivstovurnar

§ 4. Stýrið hevur skyldu til at skipa fyri høskandi fyrisiting, soleiðis at økisskrivstovur eru til at avgreiða stórri økir. Landsstýrismaðurin í skattamálum skal góðkenna talið á økisskrivstovum, hvar í landinum tær skulu liggja, og hvussu stórt øki tær skulu umfata hvør sær.

§ 5. Økisskrivstovan er líkningarvaldið í tí øki, hon umfatar, og tekur sær av allari skattaálíkning í teimum kommunum, sum hoyra til økisskrivstovuna. Somuleiðis er økisskrivstovan toll- og avgjaldsvaldið í tí øki, hon umfatar.
Stk. 2. Skattaálíkningin skal verða gjørd í seinasta lagi 31. oktober árið eftir at inntøkuárið er lokið.
Stk. 3. Freistin í stk. 2 er bert galdandi um sjálvuppgávan og ognaruppgerðin v.m. er latin inn til ásetta tíðarfreist.
Stk. 4. Økisskrivstovan kann vegna kæru ella eftir

nærri kanning av skattaálíkningini hjá einstøkum skattaborgarum, taka hesa upp aftur eftir at tíðarfreistin í stk. 2 er farin, og gera neyðugar broytingar í skattaálíkningini.
Stk. 5. Tá økisskrivstovan biðjur um tað, hevur ein kommuna skyldu til at geva økisskrivstovuni allar upplýsingar viðvíkjandi einum skattaborgara, sum kunnu vera við til, at økisskrivstovan kann gera eina sanna og rætta skattaálíkning.

§ 6. Hevur økisskrivstovan ikki góðtikið sjálvuppgávuna hjá skattgjaldara, sum hann hevur latið inn rættstundis, skal hon boða skattgjaldaranum at koma á fund við umboð fyri økisskrivstovuna, ella geva honum møguleika til skrivliga at veita greinligar upplýsingar og prógv. Í hesum føri og eisini tá ið rættstundis sjálvuppgáva er ikki innlatin, skal økisskrivstovan skrivliga gera hanu kunnugan við broytingina av inntøku hansara, orsøkina til broytingina og vegleiðing um kærumøguleika.

§ 7. Verður skattaálíkningin vegna kæru ella við nærri kanning jbr. § 5, stk. 4 tikin upp aftur til nærri viðgerðar av økisskrivstovuni og møgulga broytt, skal verða givið skattgjaldara loyvi til skrivliga ella munnliga at veita greiniligar upplýsingar og prógv. Í hesum føri skal í fráboðanini til skattgjaldara verða givin grundgeving fyri broytingini og givin skal verða kæruvegleiðing.
Stk. 2. Skal skattseting verða hækkað eftir ætli, má hetta tó verða gjørt áður enn 2 ár eru liðin frá tí, at skattaárið gekk út.
Stk. 3. Reglurnar í §§ 6 og 7 eru ikki galdandi í teimum førum, hvar ein broyting verður gjørd eftir áheitan frá skattgjaldaranum sjálvum, og hann fær fult viðhald. Skattgjaldarin skal tó altíð hava skrivlig boð um broytingina.

§ 8. Kæra um skattaálíkningina eftir reglunum í §§ 6 og 7 kann verða send kommunalu skattakærunevndini. Kæran skal vera skrivlig og grundgeving fyri kæruni skal vera við, og skal hon vera móttikin áðrenn 4 vikur eru farnar frá tí, skattgjaldari hevur fingið boð um skattaálíkningina, sum kært verður um. Kæra um avgerðina hjá kommunalu skattakærunevndini kann verða send Landsskattakærunevndini, og skal slík kæra verða send inn í seinasta lagi 4 vikur aftan á, at skattgjaldari hevur fingið boð um avgerðina.

§ 9. Samstundis, sum sjálvuppgávan verður send skattgjaldaranum fáa økisskrivstovurnar ein navnalista frá Stýrinum yvir allar persónar, feløg o.s.fr., sum skulu setast í skatt í kommununum í økjunum.
Stk. 2. Í serstaka deild á navnalistanum verða settir allir persónar, feløg, stovnanir og deyðshúgv, sum ikki eiga heima her á landi, men sum í kommununi hava tílíka inntøku, sum nevnd er í § 2 í løgtingslóg nr. 86 frá 1. september 1983 um landsskatt og kommunuskatt við seinni broytingum.

§ 10. Stýrið sendir beint aftaná 1. november kommununum ein lista við skattskyldugu inntøkuni hjá hvørjum einstøkum skattgjaldara í kommununi.
Stk. 2. Listin, ið umrøddur er í stk. 1 verður beint aftaná 1. november lagdur frain í kommununi til alment eftirlit í 11 dagar á høgligum stað fyri íbúgvararnar, eftir at tað frammanundan er kunngjørt soleiðis, sum vanligt er í kommununi. Á listanum skal verða sagt frá at skattgjaldari hevur høvi til at kæra um skattaálíkningina hjá sær og øðrum skattaborgarum til økisskrivstovuna, um hann ikki heldur at skattaálíkningin hjá honum sjálvum ella øðrum skattaborgara er bein.
Stk. 3. Verður skattgjaldari, sum ikki stendur á navnalistanum, sambært avgerð av hægri valdi skrivaður á listan og settur í skatt, skal økisskrivstovan heita á hann um at lata inn sjálvuppgávu innan hóskandi freist, sum økisskrivstovan setur. Hann verður so settur í skatt eftir somu reglum, sum galda fyri vanliga skattaálíkning, uttan tað at freistin fyri at senda økisskrivstovuni kæru um skattaásetingina er 14 dagar frá tí, at hann fekk at vita av hesi.
Stk. 4. Skattalistin má ikki almannakunngerast á annan hátt, enn ásett er í stk. 2.

§ 11. Í seinasta lagi 1. november sendir Toll- og Skattstovan kommununum upplýsingar um allar inntøktir og frádráttir frá árinum frammanundan hjá hvørjum einstøkum skattgjaldara í kommununi. Kommununar gera sínar viðmerking til álíkningina hjá økisskrivstovunum.
Stk. 2. Tað áliggur økisskrivstovunum at kanna viðmerkingarnar kommununar gera, og boða kommununum frá úrslitinum.
Stk. 3. Landsstýrismaðurin í skattamálum kann fyriskriva nøvari reglur um, hvørjir inntøku- og frádráttarupplýsingar skulu latast eftir stk. 1, nýtsluna av hesum, og at partar av hesum upplýsingum kunnu latast í árinum fyri 1. november.

Kap. 3
Skipan og starv kommunalu skattakærunevndarinnar

§ 12. Landið verður býtt upp í 7 skattakæruøkir, sum velja hvør sína skattakærunevnd.

Stk. 2. Skattakæruøkirnir eru:

1. Norðoya Øki.
2. Eysturoyar Øki.
3. Vága Øki.
4. Tórshavnar Øki.
5. N.Streymoyar Øki
6. Sandoyar Øki.
7. Suðuroyar Øki.

Landsstýrismaðurin í skattamálum ger av, hvørjar kommunur skulu hoyra til tey skattakæruøkir, sum tilskilað eru framman fyri.

Stk. 3. Kommunurnar í skattakæruøkinum velja limirnar í skattakærunevndina. Talið á nevndarlimum skal verða stakt, minst 3 og hægst 7. Fyri hvørjar av hesum verða eisini valdir tiltakslimir, sum kunnu verða innkallaðir, um tí fasta limirnir herst frá.

Stk. 4. Landsstýrismaðurin í skattamálum ger við kunngerð reglur um, hvussu valið av nevndarlimum skal fara fram, og hvussu kommunurnar skulu umboðast í skattakærunevndini.

Stk. 5. Limir og varalimir í skattakærunevndini verða valdir á fyrsta fundi aftan á nýval til bygdarráðið, og er valið galdandi fyri alt valskeið bygdarráðsins. Sigur limur seg úr nevndini, verður nýggjur valdur í hansara stað alt valskeiðið.

Stk. 6. Valbæri hava allir persónar búsitandi í Føroyum, sum lúka treytirnar um valbæri sambært løgtingslóg nr. 44 frá 19. juni 1972 um val til allar føroyskar kommunur við seinni broytingum, og eru reglurnar í nevndu lóg um, nær ein hevur skyldu at taka við vali v.m., eisini galdandi í hesum føri.

§ 13. Skattakærunevndin skipar seg við formanni og næstformanni, og er hon viðtøkufør, tá ið minsta lagi helmingurin av limunum er á fundi, ella liftakslimir teirra. Allar avgerðir skulu fyri at hava gildið verða samtyktar av minst helminginum av teimum, ið eru á fundi.

Stk. 2. Formaðurin ella í hansara stað næstformaðurin skal luttaka í øllum avgerðum. Um eitt uppskot fær líka mógvar atkvøður fyri sum ímóti, er atkvøða formansins ella í hansara stað næstformansins avgerðandi.

Stk. 3. Ongin limur má taka lut í viðgerð av kæru, tá hann er ógegnigur sambært reglunum í løgtingslóg nr. 132 frá 10. juni 1993 um fyrisiting.

Stk. 4. Limur skal sjálvur siga frá, um hann heldur iva vera um sítt gegni eftir stk. 3. Um so er, og hinir limirnir góðkenna tað, skal hann fara av fundinum, meðan málið verður viðgjort.

§ 14. Formaðurin fær samsýning, sum Landsstýrismaðurin í skattamálum ásetur eftir tilmæli frá kommununum.

Stk. 2. Fyri luttoku á fundum í skattakærunevndini verður veitt fundarsamsýning, sum er hin sama sum í øðrum nevndum í býi/bygdarráðum annars. Samsýningin verður ásett av landsstýrismanninum í skattamálum.

Stk. 3. Landsstýrið rindar samsýningina til formannin og limirnar, men fær hesa aftur frá teimum kommununum - sum skattakærunevndin umfatar - í mun til fólkatalið í kommununum.

§ 15. Tær kommunalu skattakærunevndirnar viðgera eftir reglunum í §§ 16-17 kærur um álikningina frá borgarmonum í tí øki, tær umfata. Landsstýrismaðurin í skattamálum ger eina starvsskipan, sum skattakærunevndirnar skulu arbeiða eftir. Í hesi starvsskipan skal m.a. verða álagt kommununum at veita skattakærunevndunum tá skrivstovuhjálp, tær halda vera neyðugar.

Stk. 2. Toll- og Skattstova Føroya hevur skyldu til at lata allar upplýsingar til skattakærunevndina um eitt mál, ið kært verður um. Nevndin kann eisini krevja Toll- og Skattstovuna eftir umbønum í málinum og skal annars royna at líta til vega teir upplýsingar, ið tørva til at gera úrskurð í málinum. Skattakærunevndin kann biðja Toll- og Skattstovuna lata seg umboða á fundum í nevndini, tá hon hevur kærumál til viðgerðar.

Stk. 3. Í teimum førum, tá ið beinleiðis er ætlað um inntøku skattgjaldarans, stendur tann meting við, ið Toll- og Skattstovan hevur gjørt, uttan so at hann, ið kærir, kemur við tílíkum upplýsingum og prógvum, at skattakærunevndin av tí verður før fyri sjálv at ætla um málið.

Stk. 4. Skattakærunevndin ger úrskurð um innkomnu kærurnar, og skal stoðtakanin hjá nevndini verða grundgivin.

Stk. 5. Úrskurðir skattakærunevndarinnar kunu kærast til landsskattakærunevndina innan 4 vikur eru farnar frá tí kærarin fekk kunngeika um úrskurð skattakærunevndarinnar. Toll- og Skattstovan kann eisini kæra úrskurð skattakærunevndarinnar til landsskattakærunevndina. Hetta kann tó bert gerast við samtykki frá Toll- og Skattaráð Føroya.

§ 16. Kæra til skattakærunevndina um álíkningina hjá Toll- og Skattstovuni verður send Skattakærunevndini í økinum, sum sendir kæruna við møguligari frágreiðing um málið, ið kært verður um, til Toll- og Skattstovuna í økinum, og krevur hana eftir áliti í málinum. Kæran til skattakærunevndina skal verða send skrivliga og skal styðja seg til grundir og hjáløgd prógvskjøl. Hon skal verða latin inn áðrenn 4 vikur eru liðnar frá tí at skattakravið er fingið frá Økisskrivstovuni.

§ 17. Áðrenn skattakærunevndin tekur avgerð um kæruna, sum ikki til fulnar gevur kæraranum viðhald, skal nevndin gera eina frágreiðing um málið, sum skal taka tað við, sum hon heldur er avgerandi fyri støðutakanina í málinum. Frágreiðingin verður send kæraranum, sum verður biðin um at koma við viðmerkingum til frágreiðingina innan fyri eina freist, sum kærunevndin ásetir.

Stk. 2. Tá skattakærunevndin hevur í hyggju at taka eina avgerð, sum umrødd er í stk. 1, skal hon geva tí kærandi møguleika at siga fram sína áskoðan munnliga fyri nevndini.

Stk. 3. Skattakærunevndin ger úrskurð í málinum. Nevndin hevur heimild til at taka alla skattsetingina, sum hon er, upp til viðgerðar, sama hvat kæruevnið er.

Stk. 4. Eru meira enn 3 mánaðir liðnir síðani kæran varð latin inn til skattakærunevndina, kann kæra verða latin landsskattakærunevndini, sjálvt um skattakærunevndin ikki hevur gjørt sín úrskurð.

§ 18. Skattakærunevndin kann eftir áheitan frá kæraranum taka eitt mál upp aftur, um nevndin fær upplýsingar, sum hon ikki áður hevur havt undir viðgerðini av kæruni, og um mett verður, at hesir upplýsingar vildu ført til beilt annan úrskurð frá nevndini, um upplýsingarnir vóru tøkir, tá nevndin gjørdi sín úrskurð.

Stk. 2. Skattakærunevndin kann játta eini umsókn um at taka eina kæru upp aftur, sjálvt um treytirnar í stk. 1 ikki eru loknar, um nevndin metir at serlig viðurskiftir gera seg galdandi.

Kap. 4
Toll- og Skattaráðið

§ 19. Toll- og Skattaráð Føroya fastleggur ley stevnutrið, sum Toll- og Skattstova Føroya skal arbeiða eftir á toll-, avgjalds- og skattaøkinum.

Stk. 2. Toll- og Skattaráðið er skipað av 5 limum og 5 varalimum, sum landsstýrismaðurin í skattamálum tilnevnir fyri 4 ár, og ger landsstýrismaðurin í skattamálum samstundis av, hvør skal vera formaður, og hvør skal taka sæti hansara, um hann berst frá. Ein av ráðslimunum skal vera roknskaparkønur, annar lógkønur, triði fastognar- og byggikønur og hinir báðir verða tilnevndir eftir tilmæli frá kommununum. Annar av Føroya Kommunufelag, og hin av kommununum sum ikki eru limir í felagnum. Sama er galdandi fyri varamenn.

Stk. 3. Somu reglur, sum eru galdandi um, hvør hevur skyldu at taka við í by/bygdarráði og kommunalu skattakærunevndunum, er galdandi fyri limir Toll- og Skattaráðsins.

Stk. 4. Limirnir fáa samsýning, sum landsstýrismaðurin í skattamálum ásetur.

Stk. 5. Til tess at veita Toll- og Skattaráðnum hjálp, tá biðið verður um tað viðvíkjandi serliga fløktum og truplum málum, kann landsstýrismaðurin í skattamálum skipa fyri serkønari hjálp. Hjálparmenn fáa løn, sum landsstýrismaðurin í skattamálum ásetur.

Stk. 6. Landsstýrismaðurin í skattamálum kann gera reglur fyri virkið hjá Toll- og Skattaráðnum.

§ 20. Toll- og Skattaráð Føroya hevur saman við Stýrinum eftirlit við skattaálíkningin og toll- og avgjaldsfyrisitingini og ansar eftir, at hon á øllum økisskrivstovum fer fram á rættan og samlíkan hátt og í samsvar við reglurnar í galdandi lóggávu. Toll- og Skattaráðið kann eftir tilmæli frá Stýrinum geva vegleiðingar skattaálíkningini og toll- og avgjaldsfyrisitingini viðvíkjandi. Somuleiðis kann Toll- og Skattaráðið eftir tilmæli frá Stýrinum - bæði meðan skattaálíknað verður og seinni - áleggja líkningarvaldinum at álíkna skattin uppaftur fyri einstakar skattgjaldarar ella allar, og áleggja Stýrinum at broyta toll- og avgjaldsútrokningar, sum økisskrivstovurnar hava gjørt.

Stk. 2. Toll- og Skattaráðið kann eisini eftir tilmæli frá Stýrinum, bæði meðan skattaálíknað verður og seinni áleggja Stýrinum at broyta skattsetingar, sum økisskrivstovurnar hava gjørt. Toll- og Skattaráðið kann eftir tilmæli frá Stýrinum biðja Stýrið taka álíkningar, fróknað metingar og aðrar avgerðir upp til nærri kanningar og gera broytingar í hesum. Somuleiðis kann Toll- og Skattaráðið eftir tilmæli frá Stýrinum biðja Stýrið taka toll- og avgjaldsavtrokningar, sum økisskrivstovurnar hava gjørt upp til nærri kanningar og gera broytingar í hesum.

Stk. 3. Skal skattseting verða hækkað eftir eftir, má hetta tó verða gjørt, áður enn 2 ár eru liðin frá tí, at skattaárið gekk út. Áðrenn skattaálíkning verður

broytt, skal skattgjaldarin fáa høvi til skrivliga at gera sínar viðmerkingar til skattsetingina.

§ 21. Øll tey, sum Toll- og Skattaráðið hevur sett í skatt, ella sum Toll- og Skattaráðið hevur broytt skattaálíkningina hjá, kunnu kæra avgerðina til Landsskattakærunevndina. Somuleiðis kunnu tey, sum Toll- og Skattaráðið hevur álagt toll- ella avgjald, kæra avgerðina til ávikavist Tollkæru- ella Meirvirðisavgjaldskærunevndina, og skal slík kæra verða send skrivliga innan 4 vikur eftir tað, at tey hava fingið boð um avgerð Toll- og Skattaráðsins.

Kap. 5
Landsskattakærunevndin

§ 22. Landsskattakærunevndin viðger skattakærur.
Stk. 2. Í landsskattakærunevndini eru 5 av landsstýrismanninum í skattamálum tilnevndir limir. 2 av limunum skulu vera lógkønir, 1 roknskaparkønur, 1 skal umboða arbeiðsgevarafeløgini og 1 verkamannafeløgini. Landsstýrismaðurin tilnevndir umboðini fyri arbeiðsgevarafeløgini og verkamannafeløgini eftir tilmæli frá feløgunum.
Stk. 3. Landsstýrismaðurin í skattamálum tilnevnir formannin og næstformannin, sum skulu verða lóg- ella roknskaparkønir. Á sama hátt tilnevnir landsstýrismaðurin 5 varalimir. Starvstíð nevndarinnar og varalimanna er 4 ár.
Stk. 4. Landsstýrismaðurin í skattamálum skipar fyri, at nevndin fær neyðuga skrivarahjálp og avger, um fastur skrivari skal setast í starv, ella um skrivaraarbeiði skal liggja hjá einum almennum kærustovni.
Stk. 5. Til tess at veita landsskattakærunevndini hjálp, tá biðið verður um tað viðvíkjandi serliga fløktum og truplum málum, kann landsstýrismaðurin í skattamálum eisini skipa fyri serkønari hjálp. Hjálparmenn fáa løn, sum landsstýrismaðurin í skattamálum ásetur.
Stk. 6. Limirnir fáa løn ella samsýning, sum landsstýrismaðurin í skattamálum ásetur.

§ 23. Somu reglur, um hvør kann taka lut í kæruviðgerð sambært § 13, stk. 3 er eisini galdandi fyri limir í landsskattakærunevndini.

§ 24. Landsskattakærunevndin ger úrskurð um kærur um tær metingar av tí skattskyldugu inntøkuni, sum kommunalu skattakærunevndirnar, stýrið ella Toll- og Skattaráðið hava gjørt.
Stk. 2. Skattgjaldari kann sjálvur senda inn kæru um skattseting. Tó kann skattgjaldari ikki skjóta skattseting til landsskattakærunevndina, hevur hann ikki í rættari tíð sent kæru um hana til kommunalu skattakærunevndina uttan so, at hann heldur fram, at hann er ikki skattskyldugur, ella tað eru gjørd slík formlig mistøk, tá hann varð settur í skatt, at tey kunnu ógilda skattsetingina. Kæra skal verða send, áðrenn 4 vikur eru liðnar frá tí, at skattgjaldarin fekk boð um álíkningina.
Stk. 3. Er kæra ov seint inn latin, ella eru treytirnar fyri at gera úrskurð um hana eftir tí, ið frammanfyri er áseth, annars ikki til, verður hon ikki viðgjørd. Tó er landsskattakærunevndini heimilað at taka kærur til viðgerðar í teimum førum, ið nevnd eru í stk. 2, og tá hon heldur fullgóð forfall vera, tó at lær vanligu treytir fyri hesum eru ikki uppfyltar.
Stk. 4. Kæra um skattaálíkningina verður send landsskattakærunevndini beinleiðis innan 4 vikur aftan á, at avgerðin er fingin, jbr. annars reglurnar í hesi grein og § 25.

§ 25. Kæra til landsskattakærunevndina skal verða send skrivliga og skal styðja seg til grundir og hjáløgd prógvskjøl. Tá hin kærandi ella skattgjaldarin, sum hevur eigur í málinum, biður um tað, skal hann ella umboðsmaður hansara sleppa at siga fram sína áskoðan munnliga fyri nevndini. Tá so er, skal Stýrið hava fráboðan og hava rætt til eisini at verða umboðað á fundinum.
Stk. 2. Nevndin leitar sær umframt frá stýrinum um ta innkomnu kæruna. Áðrenn Stýrið gevur hetta, krevur tað økisskrivstovuna og kommunalu skatta kærunevndina eftir øllum upplýsingum og áliti í málinum og roynir annars at fáa til vega teir upplýsingar, ið tørva til at gera úrskurð í málinum. Nevndin kann biðja Stýrið lata seg umboða, tá nevndin hevur kærumál til viðgerðar.
Stk. 3. Í teimum førum, tá ið heinleiðis er ætlað um inntøku skattgjaldara, stendur tann meting við, ið økisskrivstovan, møguliga Stýrið ella Toll- og Skattaráðið, hevur gjørt uttan so, at hann, ið kærir, kemur við tílíkum upplýsingum og prógvum afturat, at landsskattakærunevndin av tí verður før fyri sjálv at ella um málið.
Stk. 4. Landsskattakærunevndin ger úrskurð um tær innkomnu kærur, og skal støðutakanin hjá nevndini verða grundgivin. Nevndin hevur heimild til at taka alla skattsetingina, sum hon er, upp til viðgerðar, sama hvat kæruevnið er.
Stk. 5. Úrskurður landsskattakærunevndarinnar kann skjótast inn fyri Føroya Rætt innan 3 mánaðir eru farnir.

§ 26. Henda lóg kemur í gildi 1. Januar 1998.

Viðmerkingar
1. januar 1993 vóru tollvaldið og skattavaldið løgd saman til ein stovn. Á Ólavsøku 1995 kom Løgtingslóg nr. 103 frá 26. juli 1994 um stýrisskipan Føroya í gildi, og á Ólavsøku 1996 kom reglan í § 33 um ábyrgd landsstýrismanna í gildi. Hetta ber í sær, at løggávan mí er ógreið um sjálvan stovnsbygnaðin og tí má dagliørast.

Skotið verður tí upp, at løggávan um bygnaðin av toll- og skattavaldinum verður tikin úr sjálvari skattalógini, og verður ein lóg fyri seg.

Viðmerkjast kann, at eisini í londunum uttan um okkum er hetta vanligt.

Skotið verður upp, at henda lógin kemur at fevna um bygnaðin av:

1. Toll- og Skattstovu Føroya (Stýtið).
2. Tí lokala líkningarvaldinum (Økisskrivstovurnar).
3. Kommunalar Skattakærunevndir.
4. Toll- og Skattarádið, sum eisini skal hava ovasta myndugleika á toll- og avgjaldsøkinum eftir reglum, sum landsstýrismaðurin í skattamálum ger fyri virki tess. Skotið verður tí samstundis upp, at broyta navnið á Líkningarráð Føroya til Toll- og Skattaráð Føroya.
5. Landsskattakærunevndini

Viðvíkjandi verandi bygnaði á skattaøkinum og ætlaðu broytingunum verður vist til viðmerkingarnar í løgtingsmáli nr. 26/1997.

Sum nevnt í ávístu viðmerkingunum eru bygdarráðini/líkningarnevndirnar sambært galdandi lóg bæði álíkningar- og lokalur kærumyndugleiki. Kærur um álíkningina, sum skattafyrisitingin og bygdarráðið / líkningarnevndin hevur gjørt, skulu latast somu bygdarráðum/líkningarnevndum. 49 kommunur eru kærunevndir. Spurmartekin kann her setast við, hvørja trygd skattaborgarin hevur fyri, at hansara skattamál verður viðgjørt á rættan og samlíkan hátt, og at goldið verður tað, borgarin eigur at gjalda, hvørki meir ella minni.

Spyrjast kann tí um, hvussu rættartrygdin hjá borgarunum er í slíkari skipan.

Kærueindirnar eru smáar við undantak av Tórshavn og einum tveimum kommunum aftrat, so nakrar fastar mannagongdir her ikki tíl at tosa um, ei heldur kunnu vit tosa um nakran sjálvstøðugan kærustovn. Kærustovnurin hevur heldur ikki nakra fyrisiting, sum kann hjálpa til at leggja og halda skil á nøkrum føstum mannagongdum.

Tá kærustovnarnir eru nógvir í tali og smáir fáa teir fáar kærur, og krav um fyrisiting og fakligan førleika kann tí ikki gangast á møti. Trupult er eisini at vísa á nøkur krøv, sum sett verða nevndunum um rættartrygd. Tá skotið verður upp at arbeiða fram ímóti at automatisera álíkningina so nógv sum til her, og so gott sum avtaka ogntaruppgerðina í núverandi líki fyri at spara arbeiðsorku og økja um effektivitetin í álíkningini, verður uppgávan hjá teimum kommunalu skattamyndugleikunum sum eftirmansara av álíkningini nógv skerd. Skotið verður tí upp, at økisskrivstovurnar verða líkningarvaldið í teimum kommunum, sum hoyra til økið, og at ábyrgdin fyri sjálvari álíkningini verður flutt frá kommunalu líkningarnevndunum/bygdarráðunum, sum í staðin verða gjørd til kommunalar skattakærunevndir. At økisskrivstovurnar virka eftir ætlan verður tá fyrst og fremst ein uppgáva hjá stýrinum at hava eftirlit við.

Fört kann verða fram, at so kemur staðkunnleikin í álíkningini at falla burtur. Hertil er fyri tað fyrsta at siga, at tey sum arbeiða í fyrisitingini hava rættiliga stóran staðkunnleika. Tey búgva runt í økinum. Fyri tað mesta kemur so tann listi yvir álíkningina, sum skal sendast kommunnum, og sum tær skulu kanna og senda aftur til økisskrivstovurnar.

Fyri alt landið verða valdar 7 kommunalar skattakærunevndir, sum umfata allar kommunurnar í Føroyum. Kærunevndirnar verða valdar av kommununum í økinum eftir reglum sum landsstýriðsmaðurin í skattamálum skipar fyri.

Slíkar skattakærunevndir hava møguleika at byggja upp eina fyrisiting við fakligum førleika, sum kann leggja fastar mannagongdir tí roknast kann við, at hesar kærunevndir koma at fáa fleiri kærur hvør í sær. Møguleiki verður hjá borgarunum at rokna við avgerðum, sum eru tiknar eftir fastari mannagongd. Rættartrygdin skuldi alt annað líka verið betur við hesi skipan.

Kærunevndirnar verða valdar í økinum. Trygdin skuldi tí ligið í tí, at tann, sum er ónøgdur við skattafyrisitingina á økisskrivstovuni, kann kæra til skattakærunevndina, sum er tann staðkunnleiki, ið er valdur av kommununum í økinum. Her fær kæran so eina lokala viðgerð eftir fastlagdari mannagongd.

Avgerðin hjá skattakærunevndini kann kærast til landsskattakærunevndina, hvar kærarin aftur eftir áheitan bæði kann gera skrivligar og munnligar viðmerkingar til kæruna, áðrenn landsskattakærunevndin ger úrskurð í málinum.

Aftur at hesum báðum møguleikum ber so altíð til at nýta rættarskipanina.

Her kann verða lagt afturat, at skotið verður eisini upp at økja um talið á limum í Toll- og Skattaráðið Føroya við tveimum limum valdum av kommununum. Kommunurnar koma soleiðis at hava ávirkan á eftirlitið við álíkningini. Eisini verður skotið upp, at landsstýrismaðurin í fíggjarmálum við kunngerð kann áseta nærri reglur um gjaldfreist í samband við at kært verður um skattsetingina. Annars verður víst til viðmerkingarnar til tær einstøku broytingarnar.

Kommunubygnaðurin verður viðgjørdur í serstakari nevnd í løtuni. Í hesum uppskoti verður skotið upp at valdar verða 7 kommunalar skattakærunevndir, svarandi til núverandi sýsluppbýtið. Tá støða møguliga seinni verður tikin til eitt annað kommunuppbýti enn nú fyri alt landið, er onki til hindurs fyri at broyta talið av skattakærunevndum, so tað kemur at svara til talið á kommununum. Við núverandi kommunuppbýti verður ikki hildið ráðiligt at lata hvørja kommunu sær velja sína egnu skattakærunevnd. Kommunurnar eru so smáar, at fleiri av teimum vildu so gott sum onga kæru fingið, og tí vildi tað verið ógjørligt hjá teimum at uppbygt eina fasta mannagong fyri, hvussu skattakærir frá borgarunum skuldu verið viðgjørdar.

Uppskotið um, at økisskrivstovurnar verða líkningarvald í teimum kommununum, sum hoyra til øki, tekur heldur ikki støðu til hvørjar kommunur skulu hoyra til hvørja økisskrivstovu. Hetta kann altíð broytast av landsstýrismanninum í skattamálum uttan broytingar í lóggávuni annars.

Í uppskotinum verður gingið út frá, at øll fyrisiting av skatti, tolli og meirvirðisavgjaldið v.m. liggur undir sama fyrisitingarliga stovni. Lógaruppskotið er tillagað hesum viðurskiftum. Kommunurnar koma ikki at hava fyrisitingarliga ábyrgd av álíkningini sambært uppskotinum, men koma harafturímóti at vera óbeinleiðis partur av eftirlitinum, tá tær velja tveir limir í Toll- og Skattaráð Føroya. Hartil kemur eisini, at tær velja eina reint kommunala kærunevnd, sum verður 1. kærumyndugleikin hjá borgarunum.

Mett verður at fyrimunirnir við hesu skipan eru:
at rættartrygdin verður styrkt,
at álíkningararbeiði gerst munadyggari,
at Toll- og Skattstovan kann planleggja, hvussu álíkningin skal fara fram fyri alt landið,
at Toll- og Skattstovan kann menna fakliga førleikan, sum tryggjar, at álíkningin fer fram eftir galdandi lógum og reglum
at lógarverkið verður tilat arbeiða eftir.

Havandi í huga at samlaða tali av skattskyldugum persónum og felagum v.m. samanlagt er avmarkað, verður ikki hildið ráðiligt at býta fyrisitingina upp á fleiri sjálvstøðugar eindir enn sum nú er við einum stýri sum eftirlits- og planleggingarmyndugleiki og 6 økisskrivstovum. Fleiri smærri eindir vilja økja um vandan fyri at skattaborgarar í somu støðu ikki verða viðgjørdir á samlikan hátt í øllum landinum. Planleggingin av arbeiðnum verður tuplari og nýtslan av mest frankomnu tøknuni gerst órationellari og tí eisini kostbarari.

Viðmerkingar til teir einstøku kapittlarnar

Kap. 1
Stýrið

Høvuðsbroytingin er her, at serlig lóggáva verður gjørd fyri virkisøkið hjá stýrinum og økiskrivstovunum.
§ 1. Skipað verður ein umsiting undir landsstýrismanninum í skattamálum, Toll-og Skattstova Føroya, við einum stýri og 6 økisskrivstovum. Sambært § 4, stk. 1 skal landsstýrismaðurin í skattamálum góðkenna talið á økisskrivstovuni. Tilskilast skal, at Stýrið er ein partur av Toll-og Skattstovu Føroyar mannað við starvsfólki har og við hesum ikki eitt valt stýrið, sum kann samanberast við eina nevnd í t. d. einum felagsskapi.
§§ 2 og 3. Stýrið hevur eftirlit við allari skattaálíkning, allari tollfyrisiting og avgjaldsfyrisitingini fyrikomað meirvirðisgjaldi. Stórur partur av teimum uppgávum, sum Stýrið í veruleikanum rekir í dag, verða her lógarfestar. Eitt nú verður tað ábyrgdin hjá Stýrinum at gera eina virkisætlan, sum økiskrivsstovurnar skulu fylgja, og hevur Stýrið eftirlit við at ætlanin verður fylgd.

Samanumtikið kann sigast, at Stýrið hevur eftirlit við allari fyrisitingini og kann áleggja økisskrivstovunum arbeiðsuppgávur, og hevur eftirlit við, at hesar verða framdar á øllum økisskrivstovum á rættan og samlíkan hátt og í samsvar við skatta-, toll og avgjaldslóggávurna v.m.

Sambært § 3, stk. 2 kann Stýrið altíð lata seg umboða á fundi í einari kommunalari skattakærunevnd, og eisini krevja at fáa allar upplýsingar um fyrikiligar avgerðir, sum økisskrivstovurnar hava tikið. Uttan liggur onginn avmarking í hesum rætti.

Sambært stk. 3 kann Stýrið eisini altíð taka eina skattaálíkning upp aftur, ella gera eina skattaálíkning, sum ikki er gjørd. Stýrið kann altíð broyta eina skattaálíkning ella avgerð hjá økinum, og sambært stk. 6 kann Stýrið áleggja økisskrivstovunum at gera skattálíkningar, har tað metir sílkur við óretti ikki hava verið gjørdar áður. Sama regla er galdandi fyri toll- og avgjøld um Stýrið metir at slík við óretti ikki hava verið áløgd áður.

Stk. 4 og 5. Men tá tað snýr seg um úrskurðir gjørdir av kommunalu skattakærunevndunum, Toll- og Skattaráð Føroya ella Landsskattakærunevndini kann hvørki økisskrivstovan ella Stýrið broyta teir, uttan so at nýggir upplýsingar koma fram. Hendir tað, so má alt málið byrja aftur av nýggjum. Skattaborgarin skal hava boð um nýggju upplýsingarnar líkningarvaldið hevur fingið hendur á. Borgarin skal hava grundgeving fyri, at nýggju upplýsingarnir gera, at líkningarvaldið broytir avgerðina hjá omanfyri nevndu stovnum, og borgarin skal hava møguleika at kæra avgerðina við teimum vanligu freistunum í lógini.

Sambært stk. 5 kann Toll-og Skattaráð Føroya eftir tilmæli frá Stýrinum, um tað metir, at ein avgerð tikin av einari kommunalari skattakærunevnd ikki er hein, innan 4 vikur leggja hesa fyri Landsskattakærunevndina.

Sambært § 24 kunnu avgerðir hjá Toll- og Skattaráð Føroya kærast til Landsskatta-kærunevndina, eins og allar avgerðir tiknar av Stýrinum. Somuleiðis kunnu allar avgerðir um toll- og avgjøld kærast ávikavist til Tollkæru- ella Meirvirðisgjaldskærunevndina.

Kap. 2
Økisskrivstovurnar

Í § 4 verður álagt Stýrinum at skipa fyri høskandi økisskrivstovum úti um landi. Tó soleiðis, at tað altíð er

landsstýrismaðurin í skattamálum, sum skal góðkenna talið á økisskrivstovum, hvar í landinum tær skulu liggja, og hvussu stór økir hvør skal umfata.

Í § 5 verður viðvíkjandi økisskrivstovunum gjørd tann prinsippiella broytingin, sum nevnt frammanfyri, at hesar nú verða skattaálíkningarvøld í tí øki tær umfata, men tá ein økisskrivstova biður um tað, hevur ein kommuna skyldu til at geva henni allar upplýsingar, hon liggur inni við, um ein skattaborgara, sum kunnu vera við til at geva eina rætta skattaálíkning.

Sambært §§ 6 og 7 verður mannagongdin tann sama sum nú. Um økisskrivstovan ikki hevur farið eftir sjálvuppgávuni hjá einum skattgjaldara, skal hon boða honum frá hesum og um tað gerst neyðugt taka fund við hann. Allar tær skatta-, toll- og avgjaldsuppgávur, sum økisskrivstovan kann avgreiða saman við borgarunum ella semjast við teir um, verða mettar sum avgreiddar, og hevur Stýrið eftirlit við, at mannagongdin er rætt og samlík í øllum økjum í landinum og sambært lóggávuna.

Í § 8 eru ásetingar um, at kann skattaborgarin ikki semjast við líkningarvaldið, (økisskrivstovuna) kann hann kæra avgerðina til kommunalu skattakærunevndina og síðani til Landsskattanevndina. -Eins og higartil ber eisini til at leggja kærumálið fyri Føroya Rætt beinanvegin ella aftaná úrskurðin hjá einum kærumyndugleika.

§ 9 og § 10. Her er ongin broyting í mun til galdandi lóggávu.

§ 11. Fyri at fáa kommununar við, sum ein part av eftirlitinum við skattaálíkningini, verður í lógaruppskotinum álagt Toll- og Skattstovuni í seinasta lagi 1. november at lata kommununum ein lista yvir inntøkur og frádráttir í árinum frammanundan hjá hvørjum einstøkum skattgjaldara, sum er settur í skatt í kommununi. Slíkur listi kann eisini verða latin leypandi gjøgnum álíkningarárið. - Hjá stórru kommununum vil hetta nokk bava áhuga.

Landsstýrismaðurin í skattamálum kann fyriskriva neyvari reglur um slíkan lista. Kommununar fáa loyvi til at koma við sínum krøvum til hvørjar upplýsingar tær meta, listin skal hava, áðrenn landsstýrismaðurin ásetir endaligu reglurnar.

Meiningin er, at kommununar skulu gera sínar viðmerkingar um álíkningina í samband við, at tær fáa listan. Serliga verður hugsað um, at øll sum eiga at verða sett í skatt í kommununi, eru tað. Sambært stk 2 áliggur tað økisskrivstovunum, at kanna teir upplýsingar kommununar koma við, og boða kommununum frá úrslitinum. Eru upplýsingar av slíkum slag, at økisskrivstovan heldur tað vera neyðugt at taka fund við kommununa um teir, kann økisskrivstovan kalla kommunustýrið, ella um tað verður hildið nøktandi, formannin til fundar og greiða frá málinum.

Kap. 3
Kommunalu skattakærunevndirnar

Í § 12 verður skotið upp, at landið verður býtt upp í 7 skattakæruøkir, sum hvørt velur sína skattakærunevnd. Kommununar í økinum velja nevndina eftir reglum, sum landsstýrismaðurin í skattamálum ásetir. Hann ger av, hvørjar kommunur skulu høyta til tey 7 skattakæruøkini, sum nevnd eru í § 12, stk. 2, og hann ger kunngerð um, hvussu valið av nevndarlimum skal fara fram, og hvussu kommununar skulu umboðast í skattakærunevndini. Her eigur at vera hugsað um, at umboðanin fyrst og fremst verður eftir fólkatalinum, men tó soleiðis, at smáu kommununar eisini verða umboðaðar.

Í § 12 verður harumframt ásett, nær limirnir verða valdir og valskeið teirra. Allir persónar, sum lúka treytirnar, at verða valdir í eitt kommunustýri í Føroyum kunnu verða valdir í eina kærunevnd. Vil ein kommuna velja ein persón, sum ikki býr í kommununi, er onki í vegin fyri tí, tí ikki er neyðugt fyri at verða valdur av einari kommunu, at persónurin er búsettur í kommununi. Hann kann gott búgva í aðrari kommunu, men skal so lúka treytirnar fyri at verða valdur í kommunustýrið í kommununi, hann býr í.

Í § 13 verður ásett, hvussu skattakærunevndin skipar seg og hvat krevst fyri at avgerðir nevndarinnar skulu hava gildið:

> Minst helvtingurin av limunum ella tiltakslimunum teirra skulu vera á fundi,
> Minst helvtingurin av teimum sum eru á fundi skulu samtykkja avgerðina,
> Formaðurin ella næstformaðurin í hansara stað skulu luttaka í øllum avgerðum, og
> Um eitt uppskot fær líka nógvar atkvøður fyri sum ímóti, er atkvøða formansins/næstformansins avgerðandi.

§ 14 viðger gegnið hjá nevndarlimum, sum taka lut í avgerðum nevndarinnar. Uer kann sigast, at vanligu gegnisreglurnar, sum eru galdandi fyri alla almenna fyrisiting, eisini eru galdandi í hesum førum. Eisini verður samsýningin til formannin og nevndarlimirnar viðgjørd. Landsstýrið áseting samsýningina eftir tilmæli frá kommununum, og skal hon so vítt gjørligt verða tann sama, sum latin verður fyri nevndararbeiði í øðrum nevndum í bý- og bygdarráðum. Tað verður eisini hildið at verða mest praktiskt, at landsstýrið fyrst rindar samsýningina til formannin og nevndarlimirnar, sum síðan samhan við øðrum útreiðslum hjá kærunevndini verður krevd aftur frá kommununum í mun til fólkatalið, kærunevndin umfatar.

Í § 15 verður ásett, at landsstýrismanninum í skattamálum ger starvsskipan, sum nevndin skal arbeiða eftir. Í slíkari starvsskipan skal áleggjast kommununum at veita skattakærunevndunum skikkaða fyrisitingarliga hjálp. Útreiðslurnar til slíka hjálp skal landsstýrið í fyrsta umfari gjalda, men verða hesar so krevdar aftur frá kommununum í mun til fólkatalið í kæruøkjunum. Um ein kommunalur felagsskapur, sum allar kommunurnar í økinum eru limir í, vil átaka sær at gjalda útreiðslurnar fyri so at fáa tær aftur frá kommununum, er einki til hindurs fyri at lata slíkan felagsskap gera tað.

Álagt verður kærunevndunum at viðgera kærur um álíkningina frá borgarunum í økinum. Skattakærunevndin kann krevja Toll- og Skattstovuna eftir øllum upplýsingum um málið, sum eisini hevur skyldu til at veita skattakærunevndini allar upplýsingar um málið, sum kært verður um. Eisini kann skattakærunevndin krevja, at Toll- og Skattstovan kemur við áliti í málinum, samstundis sum nevndin eisini kann biðja hana senda umboð fyri seg á fund í nevndini. Annars hevur Toll- og Skattstovan altíð rætt at lata persón umboða seg á fundi í nevndini.

Í lógaruppskotinum verður eisini sagt, hvønn myndugleika nevndin hevur, og nær kært kann verða til hana. Alment kann sigast, at stórt sæð alt tað, skattaborgarin er ónøgdur við álíkningini viðvíkjandi, kann kærast til nevndina. Kemur hann við grundgevingum fyri kæruni, skal nevndin taka kæruna upp, og kann viðgera øll hansara skattaviðurskiftir. Úrskurðurin hjá nevndini skal altíð grundgevast.

Reglur eru eisini um, at avgerðir hjá skattakærunevndini kunnu kærast til landsskattakærunevndina innan ávísa freist. Toll- og Skattstovan kann eisini kæra eina avgerð hjá skattakærunevndini til landsskattakærunevndina, men har er gjørd tann avmarking, at hetta bert kann gerast við samtykki frá Toll- og Skattaráði Føroya.

Í §§ 16 og 17 eru ásettar reglur um, hvussu skattakærunevndin skal fara fram, tá kært verður til hana. Fyri tað fyrsta, so skal kæran til skattakærunevndina vera skrivlig. Fyri tað næsta so skal hon grundgevast, og neyðug prógvskjøl skulu fylgja við kæruni, og hon skal latast inn, áðrenn 4 vikur eru lidnar frá tí, at skattakravið er fingið frá økisskrivstovuni. T.v.s. 4 vikur frá tí at økisskrivstovan hevur sent skattaborgarunum skriv um endaligu álíkningina/broytingina.

Skattakærunevndin sendir kæruna við møguligum skjølum og frágreiðing til Toll- og Skattstovuna í økinum, sum verður krevd eftir áliti í kærumálinum.

Áðrenn kærunevndin tekur avgerð í málinum, sum ikki gevur kæraranum viðhald, skal nevndin gera eina frágreiðing um málið, og taka alt tað við, sum hon heldur verða avgerandi, tá støða skal takast í málinum. Henda frágreiðing verður send kæraranum, sum verður biðin um at koma við viðmerkingum innan ávísa freist. Kærunevndin skal í hesi frágreiðing eisini vísa kæraranum á, at hann kann biðja um fund við kærunevndina, so hann kann leggja sína áskoðan um kæruna fram munnliga.

Skattakærunevndin ger síðani úrskurð í málinum. Hon kann í hesum sambandi taka alla skattsetingina hjá kæraranum upp til viðgerðar uttan nakrar mun til, hvat kært verður um.

Hevur skattakærunevndin ikki gjørt úrskurð í kæruni, tá 3 mánaðir eru farnir síðani kæran varð latin teimum, kann verða kært beinleiðis til landsskattakærunevndina.

Um kærarin ikki er nøgdur við úrskurðin hjá skattakærunevndini, kann hann altíð kæra viðari til landsskattakærunevndina.

Í § 18 eru reglur um, nær skattakærunevndin kann taka eitt mál upp aftur, sum hon hevur gjørt úrskurð í. Koma nýggir upplýsingar fram, sum hon ikki kendi, tá hon gjørdi úrskurðin, kann hon altíð taka málið upp aftur, um hon metir at upplýsingarnir vilja geva annan úrskurð í málinum, ella um hon metir at serlig viðurskifti gera seg galdandi. Reglurnar í hesum sambandi eru so rúmar, at sigast kann, at tað heilt verður latið yvir til nevndina at taka støðu til, nær hon heldur eitt mál skal takast upp aftur.

Kap. 4
Toll- og Skattaráð Føroya

Í § 19 er ásett, at endamálið hjá Toll- og Skattaráð Føroya er at fastleggja tey stevnumið Toll- og Skattstova Føroya (Stýrið og økisskrivstovurnar) skal arbeiða eftir. Tvs. at Toll- og Skattaráðið skal góðkenna allar almennar vegleiðingar, rættleiðingar og tulkingar á skatta- toll- og avgjaldsøkinum, sum Toll- og Skattstovan umsitur skatta-, toll- og avgjaldslógirnar eftir, og annars taka sær av teimum uppgávum, sum lóggávan áleggur tí.

Sambært stk. 6 kann landsstýrismaðurin í skattamálum gera reglur fyri virki hjá Toll- og Skattaráðnum.

Í stk. 2 er gjørd tann broyting í mun til núverandi lóggávu, at Toll- og Skattaráð Føroya hevur 5 limir, hvar teir tveir, sum koma afturat, verða valdir av kommununum. Annar av Føroya Kommunufelag og hin av kommununum uttan fyri felagið. - Annars eru ongar broytingar í samansetingini av ráðnum, og hvør kann verða valdur, í mun til verandi lóggávu.

Sambært § 20 og § 21 hevur Toll- og Skattaráð Føroya saman við Stýrinum eftirlit við allari skattaálíkningini hjá myndugleikunum á staðnum. Eftirlitið hjá ráðnum verður nú víðkað til eisini at fevna um toll- og avgjaldsfyrisitingina hjá myndugleikanum á staðnum. Myndugleikarnir á staðnum verða nú økisskrivstovurnar hjá Toll- og Skattstovu Føroya og er hetta orsøkin til, at ráðið hevur eftirlit saman við stýrinum hjá Toll- og Skattstovuni.

Toll- og Skattaráð Føroya kann eftir tilmæli frá stýrinum geva vegleiðingar til økisskrivstovurnar um álíkningina av skatti og fyrisitingina av toll- og avgjaldsmálum. Ráðið kann eftir tilmæli frá stýrinum broyta álíkningar og avgerðir, sum økisskrivstovurnar hava gjørt og tikið. Avgerðir hjá ráðnum kunnu kærast til Landsskattakærunevndina, Tollkærunevndina ella Meirvirðisgjaldskærunevndina.

Kap. 5
Landsskattakærunevndin

Hesin kapittul í lógini viðger landsskattakærunevndina.

Skotið verður upp at broyta mannagongdina, tá teir 5 lúnirnir skulu tilnevnast, og skotið verður upp at seta ávís førleikakrøv til teir. 2 skulu verða lógkønir, 1 roknskaparkønur og 2 skulu umboða arbeiðsgevara- og verkamannafeløgini.

Landsstýrismaðurin í skattamálum tilnevnir formannin og næstformannin, sum skulu vera lóg- ella roknskaparkønir. Hartil kemur tann broyting í mun til nuverandi lóg, at nevndin hevur fastan skrivara, sum landsstýrismaðurin í skattamálum setur, men er eisini skapt heimild fyri, at skrivaraarbeiðið verður lagt til almennan kærustovn. Um landsskattakærunevndin biður um serkønna hjálp viðvíkjandi serliga fløktum og truplum málum, so kann landsstýrismaðurin í skattamálum skipa fyri serkønari hjálp. Tá tað er landsstýrismaðurin í skattamálum, sum yvir fyri løgtinginum hevur ábyrgdina av, at nevndin virkar, verður tað hildið at verða rímiligt, at hann setur og sigur úr starvi skrivaran hjá nevndini, og somuleiðis tekur avgerð, um nevndini skal veitast serkøn hjálp ella ikki, tá hon biður um tað.

Í reglunum í §§ 22-25 eru annars ikki aðrar stórvegis broytingar av prinsipiellum slag í mun til galdandi lóg. Skotið verður upp, at lógin kemur í gildi 1. januar 1998.

Broytingarnar í hesum lógaruppskoti eru annars nær tengdar at broytingunum í lógaruppskoti nr. 26/1997, og verður tí eisini víst til viðmerkingarnar í sama lógaruppskoti.

1. viðgerð 8. desember1997. Uppskotið verð beint í fíggjarnevndina, sum 22. december 1997 legði fram soljóðandi:

Álit

Málið er lagt fyri løgtingið 2. desember 1997 og eftir 1. viðgerð 8. desember 1997 beint í fíggjarnevndina.

Nevndin hevur viðgjørt málið og hevur undir viðgerðini havt fund við landsstýrismannin í skattamálum, Arnfinn Kallsberg, og umboð fyri skattaumsitingina.

Nevndin hevur býtt seg í ein meiriluta og ein minniluta.

Meirilutin (Suni Jacobsen, Eyðun Viderø, Ernst Hansen og Finnbogi Arge) førir fram, at undir viðgerðini av málinum í løgtinginum og í fjølmiðlunum er tað sjónarmið ført fram, at tað er óheppið at flyta líkningarmyndugleikan frá kommunum til landið, tá havt verður í huga, at arbeitt verður við eini broyting í kommunuskipanini. Landsstýrismaðurin hevur greitt frá, at um so verður, at kommunur verða lagdar saman í størri eindir, er einki til hindurs fyri, at líkningin tá kann verða løgd aftur til kommununar.

Vísandi til hetta og til at álikningin í veruleikanum fer fram á tann hátt, sum skotið verður upp í uppskotinum, og at hetta eisini er í samsvari við gongdina í londunum kring okkum, tekur meirilutin undir við uppskoti landstýrisins og mælir løgtinginum til at samtykkja tað.

Minnilutin (Þórður Niclasen) kennir seg ørkymlaðan, eftir at landsstýrismaðurin í kommunumálum fyri fáum døgum síðan boðaði frá, at ætlanin var - um ikki so langa tíð - at flyta álíkingina aftur til kommununar. Hetta samsvarar ikki við tað, sum uppskotið leggur upp til, og sum annars hevur verið ført fram av avvarðandi politiska myndugleika í Tinganesi.

Sostatt metir minnilutin, at eingin orsøk er fyri at fremja broytingarnar, sum landsstýrið skjýtur upp. Álitið er ikki undirskrivað av Jóannes Eidesgaard og Finnboga Ísakson

2. viðgerð 27. december 1997. Uppskotið samtykt 13-4-9. At uppskotið soleiðis samtykt kundi fara til 3. viðgerð, samtykt 15-4-7.

Samhent § 85 í tingskipanini verð samtykt at víkja frá tíðarfreistini millum 2. og 3. viðgerð 18-0-4. 3. viðgerð 30. december 1997. Uppskotið endaliga samtykt 13-10-2.

Løgtingslóg nr.169, 30. december 1997.
F.L. j. nr. 2540-39/97

28 Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um áseting av skatti til landskassan

Ár 1997 týsdagin 2.desember legði Anfinn Kallsberg, landsstýrismaður, vegna landsstýrið fram soljóðandi:

Uppskot
til
løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um áseting av skatti til landskassan

§ 1.

Í løgtingslóg nr. 87 frá 1. september 1983 um áseting av skatti til landskassan verða gjørdar hesar broytingar:

1) Í § 1 verður sum nýtt stk. sett :
"Stk. 2. Vísandi til § 54 í samtíðarskattalógin verður skattur teirra, ið umrødd eru í § 25b, stk. 1, smb. § 33, nr. 13) í somu lóg ásettur til 35%. Skatturin verður býttur við 50% sum kommunuskattur og 50% sum landsskattur.".
2) Í § 8 verður "35% av hesi bruttoinntøku" broytt til: "42% av inntøkuni uppgjørd eftir § 60, stk. 1, nr. 9 í skattalógini".

§ 2.

Hendan lóg kemur í gildi 1. januar 1998.

Viðmerkingar

Broytingin í hesum lógaruppskoti er partur av teimum broytingum, sum í løgtingsmáli nr. 26/1997 eru skotnar upp at gera fyri skatting av fiski- og sjómonnum í langfarasigling, og verður tí víst til viðmerkingarnar í sama lógaruppskoti.

1. viðgerð 8. desember 1997. Uppskotið varð beint í fíggjarnevndina, sum 22. december 1997 legði fram soljóðandi:

Álit

Málið er lagt fyri løgtingið 2. desember 1997 og eftir 1. viðgerð 8. desember 1997 beint í fíggjarnevndina.

Nevndin hevur viðgjørt málið og hevur undir viðgerðini havt fund við landsstýrismannin í skattamálum, Anfinn Kallsberg, og umboð fyri skattaumsitingina.

Meirluti (Suni Jacobsen, Eyðun Videro, Ernst Hansen, Tordur Niclasen og Finnbogi Arge) tekur undir við uppskoti landsstýrisins og mælir tinginum til at samtykkja uppskotið. Álitið er ikki undirskrivað av Jóannes Eidesgaard og Finnboga Ísakson.

2. viðgerð 27. december 1997. §§1 og 2 samtyktar 18-4-4. At uppskotið soleiðis samtykt kundi fara til 3. viðgerð, samtykt 20-3-3.

Samhent § 85 í tingskipanini verð samtykt at víkja frá tíðarfreistini millum 2. og 3. viðgerð 18-0-4. 3. viðgerð 30. december 1997. Uppskotið endaliga samtykt 17-8-0.

Løgtingslóg nr. 170, 30. december 1997.
F.L. j. nr. 2540-14/92

29 Uppskot til løgtingslóg um skattafría samanlegging o.a.

Ár 1997 týsdagin 2.desember legði Anfinn Kallsberg, landsstýrismaður, vegna landsstýrið fram soljóðandi:

Uppskot
til
løgtingslóg um skattafría samanlegging o.a.

I. Samanleggingar

§ 1. Tá partafeløg, smápartafeløg, lutafeløg ella sparikassar, sum eru skrásett í Føroyum, leggja saman, kunnu ásetingarnar í hesum kapittli nýtast.
Stk. 2. Um so er, at feløgini nýta møguleikan í stk. 1, verða felagsluttakaramir settir í skatt eftir § 9 og § 11.
Stk. 3. Tað er samanlegging, tá eitt ella fleiri feløg lata einum øðrum felagi alla sína ogn ella tá feløg leggja saman til eitt nýtt felag.

§ 2. Fyri at kunna nýta ásetingarnar um skattseting í hesi lóg, er tað ein fyritreyt, at felagsluttakaramir í felagnum, sum letur sína ogn til eitt annað felag, bert fáa partabrøv, innskotsprógv, lutaprógv ella ábyrgdarprógv afturfyri í felagnum, sum tekur ímóti ognini. Tó kunnu teir fáa upp til 10% av áljóðandi virðinum í tøkum peningi. Um tað ikki er nakað áljóðandi virði, so av bókaða virðinum.
Stk. 2. Ásetingarnar í stk. 1 eru tó ikki galdandi fyri teir kapitalpartar í uppathaldandi felagnum, sum framhaldandi felagið eigur.

§ 3. Toll- og Skattstova Føroya skal geva loyvi til, at eitt móðurfelag leggur saman við einum dótturfelagi. Hetta er tó ikki galdandi, um móðurfelagið hevur átt tann í lógini kravda meirluta fyri at taka avgerð um samanlegging, í minsta lagi í 3 ár undan samanleggingini. Toll- og Skattstova Føroya kann áseta serligar treytir fyri at geva loyvi.

§ 4. Um eitt felag, sum er við í samanleggingini, hevur ognað sær lutir á ein óvanligan hátt í einum tíðarskeiði innanfyri 3 ár áðrenn samanleggingardagin so sum fasta ogn, rakstrargógv, vørugoymslur, goodwill, virðisbrøv ella rættindi, frá felagsluttakarum ella frá einum felagi, sum ein ella fleiri felagsluttakarar í teimum feløgum, sum eru við í samanleggingini, hava ræði á, er tað ein freyt fyri at nýta ásetingarnar í hesi lóg, at Toll- og Skattstova Føroya gevur loyvi til tess. Toll- og Skattstova Føroya kann áseta serligar treytir fyri at geva loyvi.
Stk. 2. Um eitt felag, sum er við í samanleggingini, er stovnað innanfyri 1 ár undan at samanleggingin varð viðtikin, er tað ein treyt fyri at nýta ásetingarnar í hesi lóg, at Toll- og Skattstova Føroya gevur loyvi til tess. Tað sama er galdandi, um meiri enn 50% av partapeningunum, innskotspeningunum ella lutbavarapeningunum í einum felagi, sum er við í samanleggingini, ella meiri enn 50% av atkvøðurættunum hevur skift eigara styuri enn 1 ár undan degnum, samanleggingin verður viðtikin. Toll- og Skattstova Føroya kann áseta serligar treytir fyri at geva loyvi.

§ 5. Tann dagur, sum byrjunarfíggjarstøðan hjá framhaldandi felagnum er sett upp fyri í sambandi við samanleggingina, er tann skattligi samanleggingardagurin. Fyri at kunna nýta ásetingarnar í hesi lóg, skal samanleggingardagurin vera tann sami dagurin, sum roknskaparárið hjá framhaldandi felagnum byrjar.

§ 6. Framhaldandi felagið hevur skyldu at lata Toll- og Skattstovu Føroya avrit av øllum lógarkravdum skjølum. Um felagið hevur fingið loyvi til samanleggingina, hevur felagið skyldu at senda Toll- og Skattstovu Føroya avrit av øllum skjølum, sum kravd eru í loyvinum.
Stk. 2. Um samanleggingin verður framd á tann hátt, at eitt móðurfelag yvirtekur alla ogn og alla skuld hjá einum dótturfelagi, kann landsstýrismaðurin í skattamálum áseta reglur, ið greitt nevna hvørjir upplýsingar skulu latast viðvíkjandi samanleggingini.
Stk. 3. Landsstýrismanninum í skatta málum er heimilað at áseta reglur, sum greitt siga frá, hvørjar aðrar upplýsingar viðvíkjandi samanleggingini, sum móttakandi felagið skal lata Toll- og Skattstovu Føroya.
Stk. 4. Fyri at kunna nýta ásetingarnar í hesi lóg, er tað ein treyt, at tey skjøl og tær upplýsingar, sum nevndar eru í stk. 1 - 3, verða latnar Toll- og Skattstovu Føroya í seinasta lagi 6 mánaðar eftir samanleggingardagin.

Stk. 5. Um bankar og sparikassar leggja saman eftir lógini um bankar og spari-kassar, skulu skjølini og upplýsingarnir, sum nevndar eru í stk. 1 - 3, verða latnar Toll- og Skattstovu Føroya í seinasta lagi 1 mánaða eftir, at loyvi er givið til samanleggingina smb. § 48 í lógini um bankar og sparikassar.
Stk. 6. Undir serligum viðurskiftum kann Toll- og Skattaráð Føroya loyva, at vikt verður frá tíðarfreistini í stk. 4 og 5.

§ 7. Skattskylduga inntøkan hjá uppathaldandi felagnum, verður gjørd fyri tíðarskeiðið, frá seinasta vanliga rokoskaparári til samanleggingardagin, líka mikið hvussu langt hetta tíðarskeiðið er. At felagið heldur uppat í sambandi við samanleggingina, hevur onga ávirkan á skattaílikningina. Um so er, at uppathaldandi felagið hevur eitt rokoskaparár, sum endar áðrenn 31. desember, og samanleggingardagurin liggur ímillum henda dag og 31. desember, verður uppathaldandi felagið sett í skatt síðstu ferð fyri alt tíðarskeiðið frá rokoskaparárinum frammanundan og til samanleggingardagin.
Stk. 2. Framhaldandi felagið hevur skyldu at lata sjálvuppgávuna inn fyri tíðarskeiðið sum nevnt er í stk. 1. Framhaldandi felagið ábyrgist fyri møguligum skatta- og avgjaldskrøvum og fyri øllum sektarkrøvum, sum heimilaði eru í skattu- og avgjaldslóggávuni at seta ímóti tí uppathaldandi felagnum. Framhaldandi felagið yvirtekur øll krøv, sum uppathaldandi felagið hevði eftir galdandi skatta- og avgjaldslógum.

§ 8. Ogn og skuld hjá uppathaldandi felagnum, verða tikin við í skattuppgerðini hjá framhaldandi felagnum, sum um framhaldandi felagið hevði ognað sær tær fyri ta upphædd og á tí degi, sum uppathaldandi felagið ognaði tær. Skattliga verður framhaldandi felagið roknað at hava gjørt tær skattligu av- og niðurskrivingar, sum uppathaldandi felagið hevur gjørt. Ónýttir fløgugrunnar og innistandandi á Føroya Gjaldstovu, sum uppathaldandi felagið átti samanleggingardagin, verða skattliga viðgjørdir sum um framhaldandi felagið hevði átt teir alla tíðina. Hetta er eisini galdandi, hóast eftirskatting er gjørd, smb. løgtingslóg um fløgugrunnar í inntøkuárum undan, at framhuldandi felagið varð stovnað.
Stk. 2. At ogn ella skuld fer frá uppathaldandi felagnum til framhaldandi felagið í sambandi við samanleggingina, smb. stk. 1, 1. pkt, hevur onga ávirkan, tá støða skal takast til, um ognin ella skuldin er ognað í spekulatiónsendamáli ella í vinnuligum endamáli.
Stk. 3. Tá almenn lánsbrøv, veðskuldarbrøv hjá einstaklingum ella krøv, sum framhaldandi felagið hevur yvirtikið við samanleggingina, verða avhendaði ella innloyst, verður úrslitið skattliga viðgjørt á sama hátt hjá framhaldandi felagnum, sum tað skattliga hevði verið viðgjørt hjá uppathaldandi felagnum.
Stk. 4. Samanleggingin hevur ikki ávirkan á ogn og skuld sum framhaldandi felagið hevði undan samanleggingini, um tað kann ávísast, at framhaldandi felagið hevur ognað sær tær. Bæði í skattarokoskapinum og í ársrokoskapinum skulu besar ognir og skyldur vísast sum serligir rokoskaparpostar. Um hetta ikki verður gjørt, tekur Toll- og Skattstova Føroya stoðu til, um tað eru reglurnar fyri uppathaldandi felagið ella fyri móttakandi felagið, sum skulu nýtast í hesum førinum.
Stk. 5. Hevur eitt av uppathaldandi felløgunum, tá lagt verður saman, hall frá undanfarnum árum, kunnu hesi hall, óansæð reglurna í § 33, nr. 5 í skattalógini, ikki verða drigin frá í skattskyldugu inntøkuni hjá framhaldandi felagnum. Hetta er tó ikki galdandi, tá eitt móðurfelag verður lagt saman við eitt dótturfelag, sum tað hevur verið samskattað við fram til saman-leggingardagin og fimm tey seinastu árini undan hesum.

§ 9. Um partaeigarar í uppathaldandi felagnum verða samsyndir við øðrum enn við partabrøvum í framhaldandi felagnum, verður tað roknað sum partabrævasøla. Søluprísurin verður settur til kursvirðið samanleggingardagin, smb. § 5.
Stk. 2. Um partabrøv í uppathaldandi felagnum verða seld, sum nevnt í stk. 1, verður henda partabrævasølan skattliga viðgjørd eftir Virðisbrævaskattalógini.
Stk. 3. Um partaeigari hevur fleiri partabrøv í uppathaldandi felagnum enn tey, sum verða mett sum seld eftir stk. 1, og eru partabrøvini ikki útvegaði samstundis, verða tey fyrst útvegaðu roknaði sum seld. Partabrøv, sum eru ognaði samstundis, men sum ikki hava somu rættindi, ella har nøkur eru útvegaði við vinnuligum endamáli, verða roknaði sum seld eftir lutfallinum á kursinum á partabrøvunum samanleggingardagin, smb. § 5.

§ 10. Partabrøv, sum framhaldandi felagið letur ógilda í sambandi við samanleggingina, verða ikki tikin við, tá felagið verður sett í skatt, hvørki tá tað snýr seg um vinning ella um hall.
Stk. 2. Um framhaldandi felagið fær ogn partabrøv í sambandi við samanleggingina, verður vinningur ella tap, tá hesi partabrøvini verða ógildað, ikki tikin við, tá felagið verður sett í skatt.

§ 11. Partabrøv í framhaldandi felagnum, sum partaeigarar fáa sum samsýning fyri partabrøvini í uppathaldandi felagnum, verða skattliga viðgjørd sum um tey vóru útvegaði, tá tey upprunaligu partabrøvini vórðu útvegaði og fyri somu upphæddi. Um partabrøvini í uppathaldandi felagnum vórðu útvegaði í vinnuligum endamáli, verða partabrøvini í framhaldandi felagnum roknaði sum útvegaði í vinnuligum endamáli. Partabrøvini í framhaldandi felagnum koma undir reglurnar í Virðisbrævaskattalógini um partabrøvini í uppathaldandi felagnum skattliga høvdu verið viðgjørd eftir Virðisbrævaskattalógini.
Stk. 2. Eru umbýtt partabrøv ikki útvegað samstundis, ella eru nøkur partabrøv útvegaði sum liður í vinnu partaeigarans, verður hvørt einstakt partabræv roknað sum umbýti við samsvarandi partabræv í framhaldandi felagnum. Parturin verður roknaður eftir partabrævakursinum samanleggingardagin, jbr. § 5. Um tey móttiknu partabrøvini hava ymisk rættindi í felagnum, verður útrokningin gjørd serskild fyri hvørt partabrævuslagið.

II Ognir fluttar millum feløg

§ 12. Tá ognir verða fluttar úr einum felagi í ein annað, kunnu feløgini nýta reglurnar í § 13 í hesi lóg, um feløgini lúka treytirnar fyri at verða nevnd feløg eftir partafelagslógini ella eftir smápartafelagslógini, og eru skrásett í Føroyum. Tað er ein treyt fyri at nýta skattaásetingarnar í hesi lóg, at Toll- og Skattstova Føroya hevur loyvt, at ognirnar verða fluttar. Toll- og Skattstova Føroya kann áseta serligar treytir fyri at geva loyvi.
Stk. 2. At flyta ognir frá einum felagi til eitt annað er, tá allar ognirnar í einum felagi ella ein ella fleiri deildir í felagnum verða fluttar til eitt annað felag, uttan at tað fyrra felagið verður niðurlagt. Treytað av at tað felagið, sum letur ognirnar frá sær, fær partabrøv ella innskotsprógv í framhaldandi felagnum. Við eina deild í einum felagi skilst øll ogn og øll skuld í einum parti av felagnum, sum er ein sjálvstøðug eind í samlaða bygnaðinum, t.v.s. er ein eind, sum kann virka sjálvstøðugt við teimum hentleikum, sum hoyra til eindina.

§ 13. Vinningur ella tap, sum stendst av, at ogn og skuld verða flutt frá einum felagi til annað, skulu ikki takast við í skattauppgerðini hjá tí felagnum, sum letur ognina frá sær.
Stk. 2. Tá ogn og skuld verða flutt frá eintum felagi, skulu § 5, § 6, stk. 1, 3, 4 og 6, og § 8 nýtast. Framhaldandi felagið yvirtekur bert tær skattligu avskrivingarnar, sum gjørdar eru á ognir hjá tí deildini, sum er flutt. Avsetingar í fløgtgrunn, sum ikki eru nýttar, kunnu flytast heilt ella lutvíst, og tann tilsvarandi parturin av ímóti standandi á konto í Føroya Gjaldstovu fylgir tá við. Um bert ein partur av avsetingunum í fløgtgrunn verður fluttur, eru tað tær elstu avsetingarnar, sum verða fluttar fyrst.
Stk. 3. Partabrøvini ella innskotsprógvini í framhaldandi felagnum, sum felagið, ið letur ognirnar frá sær, tær aftanfyri, verða settar til tað virðið, sum svarar til tað skattfrga virðið á ogn og skuld, sum verður flutt, tann dagin flutt verður. Tað skattliga virðið verður gjørt upp eftir ásetingunum í § 4, stk. 3 í Umskipanarlógini (løgtingslóg nr. 47. frá 2. mai 1986 um umskipan av persónligum rikinum vinnuvirki til partafelag).

III Aðrar ásetingar

§ 14. Landsstýrismaðurin í skattamálum kann heimila Toll- og Skattstovu Føroya at taka avgerðir eftir hesi lóg. Landsstýrismaðurin í skattamálum kann áseta reglur um kærumøguleika eftir hesi lóg, hertundir at avgerðirnar ikki kunnu kærast til hægri umsitingarmyndugleika.

§ 15. Henda lóg kemur í gildi tann 1. januar 1998, og er galdandi fyri samanleggingar frá hesum degi.

Viðmerkingar

Skattingin av partafeløgum verður smidligari. Tað verður lættari at leggja partafelog saman. Møguleikar verða hjá feløgum í sonnu konsern at verða samskattaði og vinningsbýtisgjald skal ikki verða roknað av vinningsbýti frá dótturfelag til móðurfelag.

Roknast kann ikki við, at tað í fyrsta umfari stendst nakar fíggjarligur kostnaður av uppskotinum. Tá málið við uppsskotinum er at skapa eitt betri vinnuligt umhvørvi, kann roknast við, at uppskotini sum tíð líður koma at merkja eina ávísa meirinntøku til lands- og kommunukassar.

Tann 1. januar 1994 varð nýggj partafelagslóg sett í gildi í Føroyum við kongaligari fyriskipan. Sama dag

varð smápartafelagslógin eisini sett í gildi í Føroyum við kongaligari fyriskipan. Hesar báðar lógirnar komu ístaðin fyri partafelagslógina frá 1930 við seinri broytingum.

Kapittul 15 í lógunum ásetir, hvussu ymisk partafeløg og smápartafeløg kunnu leggja saman. Hetta er gjørt fyri at tað skal vera lættari hjá tveimum ella fleiri feløgum at leggja saman til eitt felag, uttan at allar ognir skulu handlast. Sjálvsagt er neyðugt við virðismetingum o.a. Hesar ásetingarnar eru fyri at tryggja bæði partaeigarar og ognarar, um feløg avgera at nýta hendla møguleikan. Av tí, at lógirnar á skattaøkinum ikki loyva samanlegging, mugu tey feløg, sum í dag ynskja at leggja saman, gera tvær uppgerðir, eina samanleggingaruppgerð, og eina skattliga sølu- og keypsuppgerð. Tað kann tá koma fyri, at tað ella tey feløgini, sum halda uppat, verða sett í skatt í sambandi við at luta (selja) ognir, sum skattliga eru avskrivaðar. Tað er eitt ynski hjá vinnulívinum at fáa møguleika at leggja feløg saman, uttan at samanleggingin í sær sjálvum fær skattligar avleiðingar. Tað er sera óheppið, at samanleggingar sum vinnuliga eru skilagóðar, ikki verða til nakað, tí tær viðføra at nógv skal gjaldast í skatti, uttan at nakar veruligur handil er aftanfyri.

Í londunum rundan um okkum, eru lógir sum áseta, hvussu eigur at vera farið fram skattliga, tá feløg verða løgd saman. Eisini eru lógir um, hvussu farast skal fram, tá feløg verða skild sundur, og tá ein partur av einum felagi verður lagdur í eitt annað felag. Danska fusiónsskattalógin ásetir eisini, hvussu kooperativ feløg kunnu verða løgd saman, og hvussu donsk og útlendsk feløg kunnu verða løgd saman.

Komið er til ta niðurstøðu, at eingin meining er í at táa eina rógvismikla lóg á økinum, sum bevur nógvar møguleikar og ásetingar, sum neyvan nakrantíð verða brúktir. Tí verður mett, at tað fragasta er hert at áseta reglur um at leggja saman føroysk partafeløg, smápartafeløg, lutafeløg og sparikassar, og at hava einfaldar reglur um, hvussu eitt felag kann leggja eina deild ella líknandi í eitt sjálvstøðugt felag. Um so er, at tað seinri vísir seg, at brák verður fyri at viðka lógina, eitt nú til eisini at verða galdandi fyri tryggingarfeløg og vinnurekandi grunnar, so letur tað seg altíð gera. Borið verður so í bandi, at reglurnar skulu vera so lættar at umsita sum til ber.

Tað Evropeiska Samveldið hevur álagt sínum limalondum at broyta lógarreglurnar á hesum økinum, so at feløg kunnu verða løgd saman yvir landamørk. Arbeiðsbólkurin dugir ikki at siggja, at neyðugt er her í Føroyum at hava lógarreglur hesum viðvíkjandi, tí onki bendir á, at tað kunna verða fleiri slíkar samanleggingar í Føroyum. Harafturat høvdu slíkar samanleggingar verið sera truplar og tí kravt stóra arbeiðsorku. Landsstýrismaðurin vil hava einfaldar reglur, og reglur, sum ikki seta stór arbeiðskrøv til umsitingina, um slík skipan verð tikin við.

Lógaruppskotið um at leggja feløg saman er grundað á, at tað felagið, sum heldur fram, skattliga tredkar í fótasporið hjá tí ella teimum feløgunum, ið halda uppat. Í skattateoriini verður hetta nevnt, at felagið succederar skattliga. Vanliga er tað so, at um eitt felag selur ognir ella tá feløg halda uppat, skal ein skattlig uppgerð gerast, og tá verður funnið fram til, um hetta viðførir, at skattur skal gjaldast, eitt nú av afturvunnum avskrivingum ella øðrum vinningum. Tað sama er í dag galdandi um partaeigarar selja síni partabrøv, so skal gerast upp, um tað eru nokur skattakrøv móti seljaranum. Eftir lógaruppskotinum verða partaeigararnir í uppathaldandi felagnum beri settir í skatt, um teir í sambandi við samanleggingina fáa annað enn partabrøv í framhaldandi felagnum, treytað av, at partabrøvini verða býtt javnt eftir úroknaða kursinum á partabrøvunum. Tað ella tey feløgini, sum halda uppat, verða ikki skattaði. Men framhaldandi felagið - t.v.s. tað felagið, sum heldur fram - yvirtekur ognirnar til skattliga niðurskrivaða virðið. Og harafturat verður framhaldandi felagið roknað sum um tað hevur keypt ognirnar, tá tær upprunaliga vóru keyptar og til sama endamál.

Ein einfaldur máti at býta eitt felag sundur, er at flyta sjálvstøðugar deildir í sjálvstøðug feløg. Í einstøkum førum kann hugsast, at vinnulívið kundi havt stóra nýtta av møguleikanum fyri at leggja einstakar sjálvstøðugar aktivitetir í eitt felag fyri seg. Í eini støðu, tá næsta rættarlið skal taka við, kann tað vera sera hent, at eitt felag við fjøltáttaðum virksemi verður lagt út í fleiri feløg, sum eftirkomarar síðani fara víðari sum teir hvør sær halda veta fragast. Tí er møguleikin tikin við í lógaruppskotið. Ein treyt er tó, at partabrøvini í teimum nýggju feløgunum eru samlaði í upprunaliga felagnum, sum sostatt verður eitt holdingfelag.

Í lógaruppskotinum er valt at nýta orðini uppathaldandi felagið og framhaldandi felagið fyri ávikavist tað ella tey feløgini, sum lata ognir sínar fara til eitt annað felag og fyri tað felagið, sum tekur ímóti ognunum og heldur fram.

Viðmerkingar til tær einstøku greinirnar

Ad. § 1. Í stk. 1 er ásett, at partafeløg, smápartafeløg, lutafeløg og sparikassar, sum leggja saman eftir partafelags- og/ella smápartafelagslógini, kunnu nýta hesa lógina. Fyri at samanleggingin ikki skal hava nakrar skattligar avleiðingar. Her er vert at leggja til merkis, at feløgini sjálv kunnu velja, um tey vilja nýta hesa lógina. Tað fer framvegis at vera gjørligt at leggja feløg saman eftir partafelagslógini, smápartafelagslógini og/ella banka- og sparikassalógini, og at velja ikki at leggja feløgini saman skattafrítt eftir hesi lógini. Um feløgini velja, at tey ikki vilja nýta lógina, verður ein skattlig samanlegging gjørd á sama hátt sum í dag, nevniliga at ognirnar skattliga verða seldar millum feløgini.

Eisini er ásett, at henda lógin bert er galdandi fyri feløg, sum eru skrásett í Føroyum. Hetta merkir, at feløg sum eru skrásett uttanlands ikki í skattligum høpi kunnu leggja saman við feløg, sum eru skrásett í Føroyum. Tað er tó onki sum forðar fyri, at eitt føroyskt felag keypir ognirnar hjá einum útlendskum felagi. Um eitt felag, sum er skrásett í Føroyum, men er skattskyldugt uttanlands, tí tað hevur fastan rakstrarstað uttanlands, skal leggja saman við einum øðrum felagi, sum er skrásett í Føroyum, verður henda lógin nýtt. Um eitt felag, sum er skrásett uttanlands, er skattskyldugt í Føroyum, kann lógin ikki nýtast.

Eftir stk. 2 verður møguleiki hjá verandi partaeigarum, innskotshavarum ella luthavarum at halda fram utt an at samanleggingin ávirkar teirra skattskyldugu inntøku. Í § 9 og § 11 eru reglurnar, sum áseta hvussu eigararnir verða viðgjørdir skattliga, tá feløg verða løgd saman.

Í stk. 3 verður samanlegging lýst. Her er ásett, at samanlegging er, tá eitt felag letur alla sína ogn til eitt annað felag. Við orðini "alla sína ogn" meinast, at felagið letur alla sína "nettoogn", t.v.s., at framhaldandi felagið yvirtekur eisini skuldina hjá tí uppathaldandi felagnum. Ein annar møguleiki er, at tvey ella fleiri feløg leggja saman í eitt nýtt felag. Lógin í sínni heild er nóg at hetta um, tí feløg leggja saman, tí má hetta stk. í lógini altíð merkja tað sama sum tilsvarandi lógargrein í felagslógunum.

Sambært omanfyristandandi eru fleiri samanleggingarmøguleikar. Ein møguleiki er tann sokallaða vanrætta samanleggingin (horisontal samanlegging). Tað er tá tvey feløg verða løgd saman, sum ikki eiga partabrøv hvørt í øðrum. Tað er líkamikið um partaeigararnir eru teir somu ella ikki. Eisini kunnu sokallaðar loddrættar samanleggingar (vertikalar samanleggingar) hugsast. Tað er tá annað felagið eigur partapeningin í hinum felagnum. Ognarviðurskiftini kunnu vera meiri ella minni flókt, men tað broytir ikki skattligu viðgerðina. Ein verulig samanlegging er, tá tvey ella fleiri feløg lata alla sína ogn til eitt nýtt felag, men hesin máti er ivaleyst tann, sum verður mest brúktur. Vanliga er tað eitt av verandi feløgunum sum heldur fram. Tað ella tey feløgini, sum lata ognirnar frá sær, verða síðani niðurløgd.

Ad. § 2. Skattseting í sambandi við, at feløg verða samanløgd hvílir vanliga á tað hovuðsprinsipp, at framhaldandi felagið "succederar" skattliga. Tí er tað heilt náttúrligt, at partaeigararnir halda fram at vera partaeigarar, men nú í framhaldandi felagnum. Tí er ásett, at tá feløg leggja saman, er hovuðsprinsippið tað, at partaeigararnir í uppathaldandi felagnum bert fáa partabrøv í framhaldandi felagnum alluttfyri. T.v.s. tað hendir eitt partabrævaumbýti. Hóast partafelagslógin ásetir í § 134c, sammett við § 78, at í minsta lagi 2/3 av partapeninginum skulu atkvøða fyri eini samanlegging, so verður tað rætt at vera ábyrgdarmál, at 1/3 av partapeninginum skal kunna krevja at verða innloystur, tá feløg leggja saman, tí hetta ger at tann felagsgongin, sum skal leggja saman við einum ella fleiri øðrum feløgum, viknar munandi. At júst 10% markið er valt, er tí partafelagslógin ásetir í § 20 d, at um ein partaeigari eigur meiri enn 9/10 av partapeninginum, kunnu minnilutapartaeigararnir krevja at verða innloystir. Í § 20 b er ásett, at tann partaeigarin, sum eigur meiri enn 9/10 kann krevja at keypa partabrøvini frá hinum partaeigarunum. Áseting in í lógini skal tó ikki skiljast soleiðis, at tey 10% eru fyri at keypa ein ella fleiri partaeigarar heilt út. Tey 10% kunnu eisini býtast lutvíst til allar partaeigararnar, ella bert til nakrar. Hesir kunnu tó verða partaeigarar í framhaldandi felagnum, tó sjálvsagt við einum lutfalsliga minni parti enn teir áttu í uppathaldandi felagnum.

Tá tað í stk. 1 verður sagt, at eitt felag letur sína "ogn", meinast við nettoogn, t.v.s. ogn og skuld.

Í stk. 2 er ásett, at ásetingarnar í stk. 1 ikki eru galdandi, tá framhaldandi felagið eigur partabrøv ella innskotsprógv í uppathaldandi felagnum. T.v.s. tá ognin og skuldin hjá uppathaldandi felagnum verða løgd yvir í framhaldandi felagið, verða hesi partabrøvini ella innskotsprógvini ógildaði.

Ad. § 3. Sum ein undantaksregla er ásett, at tá eitt móðurfelag skal leggjast saman við einum dótturfelagi, sum tað ikki hevur átt í meiri enn 3 ár, so skal loyvi fáast frá Toll- og Skattstovu Føroya. Orsøkin til hesa lógargreinina er, at tá slík feløg skulu leggjast saman, kunnu feløgini og/ella partaeigararnir hava gjørt ávísar handlar, sum kunnu viðføra nakrar óhepnar skattligar avleiðingar. Ætlanin er ikki, at Toll- og Skattstova Føroya skal kunna nokta at slíkar samanleggingar fara fram, men at Toll- og Skattstova Føroya kann krevja, at tær óhepnu skattligu avleiðingarnar verða burturbeindar ella alfarfördar áðrenn ella samstundis við at feløgini leggja saman skattafrátu. Serstakliga er hugsað um, at tað ikki skal vera gjørligt at umganga ásetingarnar í § 2, har tað stendur, at partaeigararnir bert skulu samsýnast við partabrøvum í framhaldandi felagnum. Men tað eru eisini aðrar óhepnar skattligar avleiðingar, sum kunnu koma fyri, um ymiskir handlar verða gjørdir í ávísari raðfylgju, bæði tá tað snýr seg um handlar við partabrøvum í feløgunum og ognum millum feløgini, og millum partaeigarar og feløgini, sum skulu leggjast saman. Her skal tó minnast á, at lógin ikki fordar fyri, at slíkar samanleggingar verða gjørdar, men er bert fyri at tryggja, at misnýtsla ikki liggur aftanfyri. Skattamyndugleikarnir skulu bert hava ein møguleika at kanna slíkar sølur, áðrenn loyvið verður givið.

§ 3 skal eisini lesast saman við § 4.

Ad. § 4. Henda greinin er, eins og § 3, sett í lógina fyri at forða fyri, at skattligar óhepnar dispositiónir verða gjørdar í sambandi við samanlegging, ella at ein samanlegging verður framd fyri at fáa ein ávísan skattligan fyrimun. Serstakliga verður her hugsað, at um feløg áðrenn eina samanlegging yvirtaka ognir frá einum ella fleiri partaeigarum á ein óvanligan hátt, so skulu skattamyndugleikarnir hava møguleika at kanna slíkar handlar. Tað skal tó viðmerkjast, at slíkar dispositiónir ikki forða fyri, at ein samanlegging verður framd, men bert at loyvi fæst til samanleggingar í slíkum førum, soleiðis at skattamyndugleikarnir fáa møguleika at seta krøv um, at óhepnar avleiðingar verða rættaðar í skattligum høpi. Vanliga hava alfir handlar fingið ta skattligu viðgerðina, ið krevst, men tá møguleiki er fyri eini samanlegging stutt eftir, at slíkir óvanligir handlar eru gjørdir, kann tað viðføra óhepnar skattligar avleiðingar, og tað er slíkum, henda greinin skal forða fyri.

Eitt dømi er, at eitt felag, sum eitt ár hevur skattligt hall, stovnar eitt dótturfelag, og sum í hesum sambandi letur ognir inn í felagið til eitt mett virði, sum er hægri enn tað skattliga virðið, og á henda hátt ásannar ein skattligan vinning, sum verður mótroknaður í tí skattliga hallinum. Stutt eftir leggja feløgini saman, og tað upprunaliga felagið fær ognina aftur, men nú við einum hægri skattligum virði, og hevur á henda hátt fingið eitt skattligt hall til framtíðar avskrivingar, sum møguliga kunnu flytast fram í meiri enn 5 ár.

Tað eru aðrir møguleikar, sum bert lugflogið setur avmarkingar fyri. Skattamyndugleikarnir skulu í slíkum førum gjøgnumganga tað, sum gjørt er tey síðstu 3 árini, og kunnu tá krevja, at skattliga verða slíkar dispositiónir neutraliseraðar áðrenn samanleggingin kann gerast. Vanliga kunnu skattamyndugleikarnir ikki nokta, at samanlegging verður gjørd, men bert seta treytir fyri skattligari viðgerðini. Men slíkar treytir skulu sjálvsagt grundast væl og virðiliga og luva hald í einari veruligari misnýtslu.

Ad. § 5. Samanleggingardagurin er í skattligum høpi, tann dagurin, sum byrjunarfíggjarstøðan hjá framhaldandi felagnum verður gjørd fyri, sum ásett í § 134h í partafelagslógini og § 103h í smápartafelagslógini. Fyri at tryggja, at raksturir í uppathaldandi felagnum/feløgunum heldur óbrotin fram í framhaldandi felagnum, er ásett, at samanleggingardagurin skal vera sami dagur, sum roknskaparárið hjá framhaldandi felagnum byrjar.

Ad. § 6. Ásetingarnar í § 6 eru nøkur formkrav, ið skulu lúkast, tá felog verða løgd saman, og sum skulu tryggja, at Toll- og Skattstova Føroya fær neyðugu upplýsingarnar viðvíkjandi saman-leggingini.

Stk. 1 ásetir, at felagið hevur skyldu at senda Toll- og Skattstovu Føroya øll lógarkravd skjøl. Í partafelagslógini og í smápartafelagslógini, ávikavist §§ 134 a - 134 e og §§ 103 a - 103 e, er ásett, at fylgjandi skjøl skulu gerast:

a. Samanleggingaráetlan.
b. felags roknskaparuppseting, sum skal vera grannskoðað, og sum skal vísa alla ogn og alla skuld hjá hvørjum einstøkum felagið, ið er við í samanleggingaráetlanini.
c. tær broytingar í roknskaparpostunum, sum kunnu standast av samanleggingini.
d. byrjunarfíggjarstøðu hjá framhaldandi felagnum eftir samanleggingina.
e. skrivlig frágreiðing um samanleggingaráetlanina og ein váttan um, at samsýningin fyri partabrevini og innskotsprógvini í uppathaldandi felagnum er rímilig, og
f. ein váttan um, at ognararnir (kreditorarnir) í teimum einstøku felagunum ikki eru verri fyri eftir samanleggingina.

Tey skjøl, sum Toll- og Skattstova Føroya kann krevja eftir § 3 og § 4 í hesi lógini, skulu eisini latast Toll- og Skattstovu Føroya.

Í stk. 2 fær landsstýrismaðurin í skattamálum heimild at áseta reglur, um hvørjar upplýsingar skulu latast myndugleikunum, tá móður- og dóttirfelog verða samanløgd. Í hesum førunum eru vanliga samanfallandi áhugamál hjá teimum felǿgum, sum skulu leggjast saman, tí kann vera neyðugt, at serlig viðurskifti skulu fastsetast í eini kunngerð.

Í stk. 3 fær landsstýrismaðurin í skattamálum heimild at áseta nærri reglur fyri hvørjar upplýsingar framhaldandi felagið skal lata Toll- og Skattstovu Føroya í samband við samanleggingina.

Í stk. 4 verður ásett, at øll skjølini skulu verða latin Toll- og Skattstovu Føroya í seinasta lagi 6 mánaðar eftir samanleggingardagin.

Í stk. 5 er tíðarfreistin at lata Toll- og Skattstovu Føroya tey kravdu skjølini tá bankar og sparikassar leggja saman, ásett til 1 mánaða eftir, at danski fíggjarmálaráðharrin hevur givið loyvi til samanleggingina.

Stk. 6 gevur Toll- og Skatturáð Føroya heimild at geva loyvi til at víkja frá tíðarfreistunum.

Ad. § 7. Henda greinin áskilir í stk. 1, hvussu tað uppathaldandi felagið skal skattsetast fyri síðstu ferð. Hóast felagið gevst, so verður skattaálíkningin gjørd á vanligan hátt hetta seinasta árið. Tó kann tíðarskeiðið í einstøkum førum verða styttri ella longri enn 12 mánaðar. Av tí, at felagið verður strikað, er ásett í stk. 2, at framhaldandi felagið hevur skyldu at lata sjálvuppgávuna hjá uppathaldandi felagnum inn, og at tað felagið eisini ábyrgist fyri skattakravinum. Samstundis er ásett, at tað framhaldandi felagið eisini yvirtekur møgulig krøv ímóti skattamyndugleikunum.

Ad. § 8. Henda greinin skipar rættarvirknaðin av eini samanlegging eftir hesi lóg.

Stk. 1 fevnir um teir ognarlutir, sum felagið, ið heldur uppat við samanleggingina, eigur. Hesir lutir verða, í sambandi við uppgerðina av skattskyldugu inntøkuni hjá tí framhaldandi felagnum, at meta sum fingnir til vega av hesum tey tíðarskeið, tá felagið, sum heldur uppat, ognaði sær teir, og fyri tær upphæddir, sum hetta felag lat fyri teir. Møguligar skattligar avskrivingar og niðurskrivingar uppá vinningsloysnu verða mettar sum gjørdar av framhaldandi felagnum. Tað eru tó bert alibrúk, ið kunnu niðurskriva goymsluna skattliga. Bindandi sáttmálar sum felagið, ið heldur uppat, hevur gjort, verða mettir sum gjørdir av framhaldandi felagnum. Avsetingar í fløgugrunn hjá uppathaldandi felagnum verða roknaðar, sum gjørdar av framhaldandi felagnum í avsetingarárinum.

Í stk. 2 verður staðfest, at tað er uttan týdning, tá avgjørt verður, um ein lutur er ognaður við spekulatiónsendamáli ella sum liður í vinnuvegnum, at luturin er farin frá uppathaldandi felagnum til framhaldandi felagið.

Eftir stk. 3 verður ávikavist vinningur ella tap, ið stendst av avhending ella niðloysing av almennum lánsbrøvum, veðskuldarbrøvum hjá einstaklingum ella krovum, sum við samanleggingina eru yvirtikin av framhaldandi felagnum, viðgjørdur eftir sonnu reglum, sum ein hevði nýtt, um vinningur ella tap varð staðfest hjá uppathaldandi felagnum.

Stk. 4 ásetir, at tann skattaliga viðgerðin av ogn og skuld, sum felagið, ið tekur ímóti, ikki hevur fingið til vega frá einum uppathaldandi felagi, ikki verður broytt vegna samanleggingina, um so er, at ogn og skuld, ið kann sannvísast at vera fingin til vega av hesum, hæði í rokniskapinum og í skattauppgerðini hjá tí framhaldandi felagnum, standa sum serligir postar. Um hetta ikki er so, tekur likningarvaldið stoðu til, um tær fyri tað uppathaldandi ella framhaldandi felag galdandi reglur skulu verða nýttar fyri hendan bólk av ogn og skuld.

Í stk. 5 verður sagt, at hall frá undanfarnum árum í einum av uppathaldandi felagunum, hóast reglurnar í § 33, nr. 5 í skattalógini, ikki kann verða drigið frá í skattskyldugu inntøkuni hjá tí framhaldandi felagnum. Hetta merkir, at tey skattligu hallini hjá teimum uppathaldandi felog-unum falla burtur. Men eitt møguligt skattligt hall hjá framhaldandi felagnum kann flytast fram og frádragast í skattligu inntøkuni hjá tí samanlagda felagnum. Hetta verður tó ikki galdandi, tá eitt móðurfelag verður lagt saman við einum dóttirfelagi, sum tað hevur verið samskattað við fram til samanleggingardagin og finnur tey seinastu árini undan hesum. Her skal havast í huga, at í dag loyvir skattalógin ikki, at felog verða samskattaði, men broytingaruppskot er gjørt til galdandi skattalóg um samskatting.

Að § 9. Ásetingin í § 9 viðvíkur saman við ásetingunum í § 10 og § 11 rættarstoðunni hjá partaeigarum o.o.

§ 9 inniheldur ásetingar um, hvussu farast skal fram í teimum førum, har partaeigarans partabrøv í uppathaldandi felagnum heilt ella partvíst verða goldin við øðrum partabrøvum í framhaldandi felagnum. Um samsýningin fyri partabrøv í uppathaldandi felagnum er annað enn partabrøv í framhaldandi felagnum, eru hesi at rokna sum seld til triðjamann fyri kursvirðið, sum var galdandi á samanleggingardegnum. Møguligur vinningur við hesi sølu verður viðgjørdur eftir Virðisbrævaskattalógini.

Í stk. 3 verða ásettar reglur fyri hvørji partabrøv skulu roknast fyri at vera innfráð í teimum førum, har partabrøvini í uppathaldandi felagnum ikki eru útvegaði um somu tíð, har partabrøvini eru av ymiskum slagi, ella har hesi fyri ein part eru útvegaði sum liður í vinnu partaeigarans.

Að § 10. Tá eitt móðurfelag verður samanlagt við sínum dóttirfelagi, koma aktiv og passiv hjá dóttirfelagnum sum heild ístaðin fyri partabrøvini hjá móðurfelagnum í dóttirfelagnum. Tá dóttirfelagið í sambandi við samanleggingina heldur uppat, má móðurfelagið ógilda øll partabrøvini í uppathaldandi felagnum, uttan at tað afturfyri er grundarlag fyri at útgeva nýggj partabrøv í framhaldandi felagnum.

Um so er, at bókaðu virðið av dóttirfelagsportunum ikki svarar til veruliga virðið av dóttirfelagsins samlaðu ognum, sum verða yvirtiknar við samanleggingini, staðfestir móðurfelagið ein vinning ella eitt tap. Sum skotið upp í stk. 1 skal úlíkur vinningur ella tap ikki takast við í skatsetingini av framhaldandi felagnum.

Um uppathaldandi felagið eigur partabrøv í framhaldandi felagnum, kemur hetta í sambandi við samanleggingina at eiga egin partabrøv. § 48, stk. 2 í Partafelagslógini ásetir reglur um, at egin partabrøv, sum eru útvegaði í sambandi við samanlegging, skulu avhendast so skjótt hetta kann fata seg gera uttan tap fyri felagið, og um so er, at partabrøvini eru útvegaði í sambandi við yvirtokuna av eini verandi fyritoku, í seinasta lagi innan 2 ár. Um so er, at avhendingin ikki er møguligt, skulu partabrøvini ógildast í sambandi við niðurskriving av partapeningunum.

Einsljóðandi reglur finnast í lóg um smápartafeløg.

Tá egin partabrøv, sum eru útvegaði í sambandi við samanlegging, ikki skilja seg frá øðrum aktivum, sum eru yvirtikin frá uppathaldandi felagnum, verður framhaldandi felagið skattað av einum møguligum vinningi, sum fæst gjøgnum álatgdu avbendingina av portunum. Verður felagið harafturfyrití noytt til at ógilda partin í sambandi við niðurskriving av partapeningunum, verður hildið at vera rímiligt at halda vinning ella tap í hesi støða utan fyri ásetingina av skattskyldugu inntøku felagsins, sum ásetingina í stk. 2. Sum ein náttúrlig fylgja av ógildingini verður skotið upp, at yvirtøkuvirðið av hesum egnu partabrøvunum ikki skal kunna ávirka skattliga útveganarvirðið av egnu partabrøvunum hjá framhaldandi felagnum.

Ad. § 11. Henda greinin ásetir, hvussu tey partabrøvini, innskotsprógvini ella luthavaraprógvini, sum partaeigararnir fáa í framhaldandi felagnum afturfyri partabrøvini í uppathaldandi felagnum skattliga skulu viðgerast, tá tey seinni verða seld. Her er ásett, at tað ikki bert er framhaldandi felagið, sum "succederar" skattliga, men eisini partabrøvini. Soleiðis at skilja, at tey nýggju partabrøvini verða mett at verða ognaði, tá tey upprunaligu partabrøvini vóru ognaði og fyri somu upphædd. Henta hevur týdning, um tey verða seld seinni, tí partaeigarin verður sendur í skatt eftir Virðisbrævaskattalógini, t.v.s. at tað hevur sera stóran týdning hvussu feingi viðkomandi hevur átt partabrøvini. Vanliga er ongin trupulleiki at halda skil á hesum viðurskiftunum. Tó kann tað koma fyri, at ein partaeigari hevur keypt partabrøv, og soleiðis eru nøkur gomul, meðan onnur eru nógv nýggjari. Eisini kunnu kursirnir keypt er fyri vera heilt ymiskir. Um slík partabrøv verða seld, mugu tey gerast upp hvørt fyri seg. - Í lógini verður eisini ásett, at tey seinnu partabrøvini verða mett at verða ognaði við sama endamáli, sum tey upprunaligu partabrøvini.

Ad. § 12. Í greinunum 12 og 13 verður møguleiki fyri at flyta ein part av einum felagi yvir í eitt annað felag. Treytirnar fyri hesum eru, at feløgini eru skrásett í Føroyum, at tann parturin, sum verður fluttur, kann virka sum ein sjálvstøðug eind, at tað veruliga er talan um feløg eftir definitiónini í partafelagslógini og at samsýnt verður í partabrøvum ella innskotsprógvum. Eitt dømi um eitt felag, sum kundi verið býtt sundur á henda hátt, er ein bilsøla og bilverkstaður. Tað er ógvuliga vanligt, at bæði søludeildin og verkstaðurin eru í sama felagi. Sum ein hjálp, eitt nú tá eitt yngri ættarlið skal taka við, kann tað hugsast at vera ein góður máti, at onnur deildin ella báðar deildirnar verða fluttar í hvør sítt felag. Slíkar flytingar kunnu eisini hugsast innan fiskivinnuna og alivinnuna. Tað upprunaliga felagið verður tó ikki avtikið, men heldur fram sum eitt sokallað "holdingfelag". T.v.s. at upprunaliga felagið eigur partabrøvini í tí ella teimum nýggju feløgunum.

Eitt felag kann eisini flyta alla sína ogn og skuld til eitt annað felag. Tá verður felagið nøkulunda í somu støðu sum eitt uppathaldandi felag í eini samanlegging, men munurin er tó, at tá eitt felag flytur ein part ella alla nettoognina yvir í eitt annað felag, so skal tað upprunaliga felagið ikki niðurleggjast, men heldur fram og eigur partabrøvini í tí felagnum, sum hevur fingið ognina flutta. Tá talan er um samanleggingar, heldur eitt ella fleiri feløg uppat, og skulu strikast, meðan tað eru eigararnir, sum fáa partabrøv í framhaldandi felagnum.

Í § 12 er ásett, at Toll- og Skattstova Føroya skal loyva, at slíkar flytingar verða gjørdar. Her er talan um somu treyt, sum tá móður- og dótturfelag verða løgd saman. Her skal verða mint á, at meiningin er ikki, at Toll- og Skattstova Føroya skal finna eina grundgeving fyri at nokta, men er reglan ásett fyri, at Toll- og Skattstova Føroya skal fáa møguleika at fáa allar síðurnar lýstar, tí í hesum førunum kann vera talan um samanfallandi áhugamál hjá móttakara og lutara. Sum høvuðsregla skal loyvi gevast, men noktast kann, um skattaborgari fær nakrar fyrimunir ella vansar, sum ikki vóru tilætlaðir.

Í stk. 2 verður ásett, at felagið, sum letur ogn frá sær, heldur fram, og skal hava partabrøv í framhaldandi felagnum alfurfyri tá ognina, sum er flutt.

Ad. § 13. Í § 13 er ásett, at flyting millum feløg ikki fær skattligar avleiðingar fyri felagið, sum letur ognirnar frá sær. Felagið, sum fær ognirnar kemur í somu skattligu støðu sum latandi felagið, t.v.s. at tað succederar skattliga.

Stk. 2 ásetir, at tá ogn verður flutt millum feløg, eru sonn treytir viðvíkjandi upplýsingum galdandi, sum tá feløg verða løgd saman. Um ónýttir fløgugrunnar verða fluttir, verða teir elstu fluttir fyrst. Her skal nevnast, at lógin um fløgugrunnar er broytt soleiðis, at ikki ber til at seta í fløgugrunn longur, so hetta er hent aktuelt í nøkur ár afturat.

Stk. 3 ásetir, at skattliga virðið á teimum partabrøvum, sum tað latandi felagið fær í framhaldandi felagnum, skal gerast upp á sama hátt sum tá eitt privat virki verður umskipað til eitt partafelag eftir Umskipanarlógini. Tá slíkar flytingar verða gjørdar verða tvær uppgerðir gjørdar. Onnur er við støði í teimum roknskaparligu virðunum. Hesi virðini kunnu verða eftir bókhaldinum ella eftir eini meting. Hin uppgerðin verður gjørd eftir teimum søguligu skattligu virðunum. Tað er sera umráðandi, at tað er kontinuitetur í teimum skattligu virðunum. Tað kunnu verða heilt stórir munir á tí roknskaparligu og tí skattligu uppgerðini. Um partabrøvini verða seld seinri, verður tað skattliga virðið grundarlag fyri skattligu søluuppgerðini.

Ad. § 14. Her kann landsstýrismaðurin í skattamálum heimila Toll- og Skattstovu Føroya at taka tær neyðugu avgerðirnar eftir hesi lóg. Harafturat kann landsstýrismaðurin áseta reglur um kærumøguleika.

Ad. § 15. Eftir § 15 verður mælt til, at hesda lógin kemur í gildi 1. januar 1998. Hetta merkir, at samanleggingar og flytingar kunnu gerast við gildi frá 1. januar 1998.

1. viðgerð 8. desember 1997. Uppskotið varð beint í fíggjarnevndina, sum 22. december 1997 legði fram soljóðandi:

Álit

Málið er lagt fram av landsstýrinum 2. desember 1997 og eftir 1. viðgerð 8. desember 1997 beint í fíggjarnevndina.
Nevndin hevur viðgjørt málið og hevur undir viðgerðini havt fund við landsstýrismannin í fíggjarmálum, Anfinn Kallsberg, saman við umboðum fyri fíggjar- og skattaumsitingina og Jógvan Arnonsson, grannskoðara. Meirlutin (Suni Jacobsen, Eyðun Videro, Ernst Hansen, Tordur Niclasen og Finnbogi Arge) tekur undir við uppskoti landsstýrisins og mælir løgtinginum til at samtykkja uppskotið. Álitið er ikki skrivað av Jóannes Eidesgaard og Finnboga Ísakson.

2. viðgerð 27. december 1997. Uppskotið samtykt 20-3-0. At uppskotið soleiðis samtykt kundi fara til 3. viðgerð, samtykt 20-3-0.

Sambært § 85 í tingskipanini varð samtykt at víkja frá tíðarfreistini millum 2. og 3. viðgerð 18-0-4.

3. viðgerð 30. december 1997. Uppskotið, sum samtykt við 2. viðgerð, endaliga samtykt 19-6-0.

Løgtingslóg nr. 171. frá 30. december 1997.
FL. j. nr. 2540-49/97

30 Uppskot til løgtingslóg um landsskatt og kommunuskatt

Ár 1997, týsdagin 2.desember, legði Anfinn Kallsberg, landsstýrismaður, vegna landsstýrið fram soljóðandi:

Uppskot
til
broyting í løgtingslóg um landsskatt og kommunuskatt

§ 1.

Í løgtingslóg nr. 86 frá 1. september 1983 um landsskatt og kommunuskatt við seinni broytingum verða gjørdar hesar broytingar:

1) § 30, stk. 1 verður orðað soleiðis:
"Av vinningsbýti, sum sambært § 25, nr. 3, a) ikki er undir skattskyldu hjá móttakara, verður latið eitt avgjald til landskassan uppá 35%. Feløg, sum eiga 25% ella meiri av partapeningunum í tí útlutandi felagnum, skulu ikki gjalda avgjald av vinningsbýtinum. Avgjald skal ikki latast av vinningsbýti til partabrøv, sum tað útlutandi felagið sjálvt eigur. Felag, sum útlutar vinningsbýti, skal halda aftur hetta avgjald, og í seinasta lagi 14 dagar aftaná aðalfundarsamtykt um hetta, rinda peningin til Føroya Gjaldsstovu, og skal felagið eisini senda Toll- og Skattstovu Føroya eitt yvirlit yvir vinningsbýti, og hvussu avgjaldið er roknað og hvørji feløg ikki skulu rindað avgjald.".
2) Sum 2. pkt. í § 30, stk. 3 verður sett:
"1. pkt. er tó ikki galdandi, tá eitt felag heldur uppat ella ognir verða fluttar sambært løgtingslóg um skattafríar samanleggingar.".
3) Í § 54, stk. 1, 1. pkt. verður eftir "persónar," sett: "skatturin fyri".

§ 2.

Henda lóg kemur í gildi 1. januar 1998, og er galdandi fyri vinnigsbýti fyri roknskaparár, sum enda í ella falla saman við 1998.

Viðmerkingar

Í nøkrum førum eru ognarviðurskiftini í einstøkum feløgum sera torgreidd við fleiri feløgum ímillum. Hví viðurskiftini eru vorðin soleiðis, eru tað fleiri orsøkir til. Eitt er, at tá fleiri feløg taka seg saman og seta eitt nýtt felag á stovn, sum síðani tekur seg saman við sonn feløgum ella øðrum og stovnsetir eitt nýtt felag. Í summum førum er hetta komið tá eitt nýtt ættarlið hevur tikið við.

Tá ognarviðurskiftini eru háttaði soleiðis, at tað eru eitt ella fleiri feløg ímillum tað felagið, sum lutar vinningsbýti út og teir veruligu eigararnar, t.v.s. teir fíkarligu persónarnar, sum eiga felagið, verður ofta nýtt nógv tíð og orka at finna útav, hvussu eigararnir kunnu fáa vinningsbýti út á bíligasta hátt. Hetta verður gjørt, tí sum tað er í dag, so skal vinningsbýtisavgjald gjaldast hvørja ferð vinningsbýti verður goldið frá einum felagið til eitt annað.

Tað avlopið sum feløg hava, verður skattað við 27%. Tey 73%, sum eru eftir, eiga partaeigararnir. Um teir skulu hava tað út, skulu teir gjalda 35% í avgjaldi. Tá eru 47,5% eftir. Um partaeigarin er eitt annað partafelag, sum lutar peningin út til eigararnar, skal avgjald aftur gjaldast. Tá eru 30,8% eftir. Er tað aftur eitt felag sum eigur partapeningin, so skulu 35% gjaldast av teimum 30,8%, sostatt eru bert 20,0% eftir til endaligu partaeigararnar. Henda rekkjan kann halda fram.

1) Sambært felagsbøgunum, kann eitt partafelag ella eitt smápartafelag, eiga upp til 10% av partapeningunum hjá sær sjálvum. Í veruleikanum eru tað hinir partaeigararnir, sum eiga tilsvarandi meiri. Tí í staðin fyri at ogntarføra ein slíkan partabrævs post, skuldi felagið eisini niðurskrivað partapeningin tilsvarandi. Tí er eisini ásett í roknskaparlógini, at um so er, at eitt felag eigur partapening í sær sjálvum, so skal ein tilsvarandi upphædd setast av undir egnipeningunum í serligan grunn. Tað vinningsbýti, sum fellur á tey partabrøvini, sum felagið sjálvt eigur, verður ongantíð goldið út úr felagnum, men avgjald skal gjaldast. Hetta er sera

óheppið, tí verður skotið upp, at hetta verður broytt soleiðis, at avgjald ikki skal roknast av hesum partinum av vinningsbýtinum.

Sum greitt frá undir viðmerkingurtum omanfyri, so kemur tað fyri, at tað eru fleiri feløg millum tað felagið sum útlutar vinningsbýti og endaligu eigararnar, so at lítið ella onki verður eftir, tá avgjald verður roknað fleiri ferðir. Hetta kann freista onkran eigara, at royna at fáa vinningsbýti út á annan hátt. Tað ger so tað, at eftirlitsuppgávan hjá Toll- og Skattstovuni verður størri og truplari, tí tað er trupult at avgera, hvat er dult vinningsbýti og hvat ikki er tað.

Tað eru sjálvsagt í flestu førum høvuðspartaeigararnir, sum hava møguleika at taka avgerðir, sum seinni kunnu tulkast sum dult vinningsbýti. Vanliga verður í skattligum høpi ásett, at høvuðspartaeigari er ein persónur, sum eigur 25% ella meiri í einum felagi.

Í stuttum kann sigast, at broytingarnar í stk. 1 hava tit endamáls, bert at áseta vinningsbýtisavgjald, tá vinningsbýti fer til teir endaligu eigararnar. Tí ikki fyrr enn tá fer peningurin úr vinnuliga økinum til tað privata økið.

Í dag er tað soleiðis, at tá aðalfundurin í einum felagi samtykkir at útluta vinningsbýti, so skal felagið afturhalda 35% í avgjaldi, sum skal sendast til Føroya Gjaldstovu. Føroya Gjaldstova hevur ikki nakra eftirlitsábyrgd, men skal bert ásanna, at nú er ein ávís peningaupphædd flutt á konto, og sjálvsagt eisini at gera tær neyðugu skrásetingarnar í bókhaldinum. Men Toll- og Skattstova Føroya, sum er eftirlitsmyndugleiki í skatta- og avgjaldsmálum, fær onki at vita um vinningsbýtisavgjaldið. Tí verður mælt til, at tey feløg, sum útluta vinningsbýti, eisini skulu senda Toll- og Skattstovu Føroya eitt yvirlit, sum greitt vísir, hvussu stórt vinningsbýti er, og hvussu avgjaldið er roknað, t.v.s. eitt yvirlit yvir, hvussu nógv partabrøv felagið eigur í sær sjálvum, og hvussu nógv høvuðspartaeigararnir eiga og hvørjir teir eru.

2) Hetta stykkið verður soljóðandi:

"Stk. 3. Fyri vinningsbýti av partabrøvum, lutaprógvum o.o.m. verður roknað alt, ið partaeigarar, luthavarar o.a.m. fáa útgoldið sum part av avlopi felagsins í síðsta rokningsskaparári ella undanfarnum árum, annaðhvørt hetta avlop er tilkomið sum innvunnið rakstraravlop av sølu ella uppskriving av oguum felagsins, ella á annan hátt, og annaðhvørt tað er útgoldið sum vinningsbýti, sum útlutan, tá felagið er avtikið, ella tílíkt. 1. pkt. er tó ikki galdandi, tá eitt felag heldur uppat ella ognir verða fluttar sambært løgtingslóg um skattafrían samanleggingar.".

Hetta er ein teknisk broyting, sum hongur saman við, at uppskot um eina nýggja lóg um skattafría samanlegging verður løgd fyri Løgtingið. Í uppskotinum til ta lógina er ásett, at tá tvey ella fleiri feløg leggja saman, skal eitt felag halda fram, meðan hini feløgini halda uppat. Eigararnir í tí/teimum uppathaldandi felagnum/feløgunum skulu hava partabrøv í tí framhaldandi felagnum afturfyri tey gomlu partabrøvini. Um henda broytingin ikki verður gjørd, verður slíkt umbýti skattliga mett sum vinningsbýti, og harvið skal avgjald gjaldast. Men eigarin fær onki útlutað í sín part, sum hann ikki átti frammanundan, tað er bert talan um eitt umbýti.

3) Talan er um eina nágreining av galdandi rætti.

1. viðgerð 8. desember 1997. Uppskotið varð beint í figgjarnevndina, sum 22. december 1997 legði fram soljóðandi:

Álit

Málið er lagt fram av landsstýrinum 2. desember 1997 og eftir 1. viðgerð 8. desember 1997 beint í figgjarnevndina.

Nevndin hevur viðgjørt málið og hevur undir viðgerðini havt fund við landsstýrismanin í figgjarmálum, Anfinn Kallsberg, saman við umboðum fyri figgjar- og skattaumsitingina og Jógvan Antonsson, grannskoðara.

Meirilutin (Suni Jacobsen, Eydun Videro, Ernst Hansen, Tordur Niclasen og Finnbogi Arge) tekur undir við uppskotij landsstýristns og maelir løgtinginum til at samtykkja uppskotið. Álitið er ikki undirskrivað av Jóannes Eidesgaard og Finnboga Ísakson.

2. viðgerð 27. december 1997. Uppskotið samtykt 20-3-0. At uppskotið soleidis samtykt kundi fara til 3. viðgerð, samtykt 20-3-0.

Sambært § 85 í tingskipanini verð samtykt at víkja frá tíðarfreistini millum 2. og 3. viðgerð 18-0-4.

3. viðgerð 30. december 1997. Uppskotið, sum samtykt við 2. viðgerð, endaliga samtykt 24-1-0.

Løgtingslóg nr. 172, 30. december 1997.
F.L. j. nr. 2540-5/91

31 Uppskot til løgtingslóg um kolvetnisvirksemi

Ár 1997, týsdagin 18. november, legði Eilif Samuelsen, landsstýrismaður, vegna løgmanni, vegna landsstýriði, fram soljóðandi:

Uppskot
til
løgtingslóg um kolvetnisvirksemi

Kapitul 1
Almennar reglur

§ 1. Lógin er galdandi fyri forkanningar o.a.m., leiting eftir, framleiðslu og flutning av kolvetnum gjøgnum rørleiðing á føroyskum land , sjó og landgrunnsøki. Lógin er eisini galdandi fyri havstøðir, smb. § 2, litra b.
Stk. 2. Lógin miðar móti vartsligari og skynsamari leiting eftir og gagnnýting av kolvetnistilfeingnum til gagns fyri føroyskan búskap og arbeiðsvinnu í Føroyum. Virksemið skal verða soleiðis skipað, at neyðug fyrivarni eru tikin fyrt fiskiskapi, sigling, umhvørvis- og náttúruáhugamálum umfram øðrum samfelagsligum áhugamálum.

§ 2. Í hesi lóg skilst við:
a) *Kolvetni:* jarðolja, dropagass, jarðgass og onnur kolvetni, sum náttúrliga eru í undirgrundini, og sum kunnu framleiðast flótandi ella í luftlíki.
b) *Havstøðir:*
   (i) Fastur útbúnaður sum pallar, rørleiðingar og onnur virki og innretlingar á sjóøkinum og landgrunninum, ið verða nýtt til virksemi, nevnt í § 1.
   (ii) Flytandi eindir sum boriskip, -reiði, framleiðslu-, goymslu-, íbúðar- og tílík før, meðan tey eru støðuføst og verða nýtt til virksemi, nevnt í § 1.

§ 3. Kolvetni, nevnd eru í § 1, hoyra Føroyum til. Forkanning, letting ella framleiðsla kann einans setast í verk av øðrum við loyvi, fingnum samhvørt reglunum í hesi lóg.
Stk. 2. Føroyskur rættur annars er galdandi fyri havstøðir á landgrunninum og trygdarøki rundanum, er ikki annað ásett í aðrari lóggávu ella í reglum ásettum av landsstýrinum.

Kapitul 2
Forkanningar o.a.m.

§ 4. Landsstýrið kann veita loyvi til forkanningar við atliti at leiting eftir og framleiðslu av kolvetnum í undirgrundini og til vísindaligar kanningar av undirgrundini, sum hava týdning fyri hetta virksemið.
Stk. 2. Verður ikki stytri tíðarfreist ásett í einum loyvi, er tað galdandi í 3 ár. Í loyvinum skal verða tilskilað, hvørji øki, tað fevnir um.
Stk. 3. Loyvi til forkanningar gevur rættindi til jarð

frøðiligar, jarðalisfrøðiligar, jarðevna-frøðiligar og jarðtøkniligar kanningar. Loyvið gevur ikki rætt at bora eftir ella at framleiða kolvetni, heldur ikki forrætt til seinni leitingar- og framleiðsluloyvi.

§ 5. Landsstýrið kann áseta treytir fyri einum forkanningarloyvi ella eitum loyvi til vísindaligar kanningar, herundir um rindan av avgjaldi og ágávu og frágreiðing um gongdina í kanningunum og um úrslitini, og um trúnað.
Stk. 2. Landsstýrið kann áseta reglur um avgjøld og ágávu fyri at veita loyvi.

Kapitul 3
Leiting og framleiðsla

A. Loyvi og treytir.

§ 6. Landsstýrið kann veita loyvi við einkarrætti til leiting eftir og framleiðslu av kolvetnum á neyvt ásettum økjum við gjølla ásettum treytum. Loyvi kann bert veitast umsøkjarum, sum ætlandi hava neyðugan sakkunnleika, roynslu, førleika og fíggjarorku. Tá avgjørt verður at veita loyvi, skal landsstýrið leggja dent á, í hvønn mun tað almenna fær innlit í og gagn av loyvda virkseminum.
Stk. 2. Í loyvi eftir stk. 1 skulu vera reglur um tey viðurskifti, nevnd eru í §§ 8-12, og harafturat kann landsstýrið áseta treytir, ið hildnar vera neyðugar.

§ 7. Loyvi til leiting eftir og framleiðslu av kolvetnum verður sum meginregla veitt eftir at almenn er lýst eftir umsóknum.
Stk. 2. Áðrenn lýst verður eftir umsóknum, leggur landsstýrið eina frágreiðing fyri løgtingið um, hvørji øki ætlanin er at bjóða út, og um almennu treytirnar ætlanin er at seta. Í frágreiðingini skal metast um, hvørjar avleiðingar kolvetnisvirksemið kann hava fyri sigling, fiskiskap og aðrar vinnur, náttúru-, umhvørvis-, og onnur samfelagsáhugamál. Eisini verður mett um, hvat tkast virksemið fer at geva búskapi og arbeiðsvinnu.
Stk. 3. Landsstýrið kann láta vera við at geva leimum loyvi, ið søkt hava eftir almenna lýsing.
Stk. 4. Landsstýrið kann áseta krøv um gjald av ágávu fyri viðgerð av umsóknum og veiting av loyvum eftir § 6.

§ 8. Loyvi eftir § 6 til leiting verður veitt fyri tíðarskeið, ikki longri enn 12 ár, ið kunnu verða longd við upp til 2 ár í senn. Leitingarskeiðið alt kann tó ikki fara upp um 16 ár.
Stk. 2. Hevur loyvishavi lokið tær í loyvinum ásettu treytirnar fyri leingingi av loyvinum, hevur hann krav um at loyvið verður longt við atliti at framleiðslu fyri eitt skeið, ið ásett verður í loyvinum, og sum ikki kann fara upp um 30 ár. Leingingið av loyvinum skal í minsta lagi galda fyri teir partar av økinum, ið fata um rakstrarverdar fundir, ið loyvishavi ætlar at framleiða. Landsstýrið kann sum treyt fyri at leingja loyvið krevja, at umsókn um góðkenning av leiðbyggiætlan sambært § 14, stk. 2 verður innsend innan nærri ásetta tíðiliga freist.

§ 9. Ásett verður í loyvi eftir § 6 hvørjar arbeiðsskyldur loyvishavin skal lúka í leitingarskeiðinum sambært § 8, stk. 1, og hvørji avgjøld loyvishavin skal rinda tí almenna. Eitt nú kann ásetast, at rindast skal rennandi avgjald, roknað eftir viddini av loyviøkinum (víddargjald) og avgjalt roknað eftir nøgd ella virði av framleiddum kolvetnum (framleiðslugjald).

§ 10. Í loyvum eftir § 6 verða reglur ásettar um brúk av føroyskari arbeiðsmegi, veitingar og tænastur frá føroyskum fyritøkum, um útbúgvingar v.m., umframt hvaðan loyvishavin rekur virksemi sítt.

§ 11. Í loyvum eftir § 6 ella í fyriskipanum ásettum av landsstýrinum sambært § 29 verða gjølfari reglur ásettar um, at loyvishavin skal láta inn fíggjarligar og roknskaparligar upplýsingar eins væl og upplýsingar um leitingar- og framleiðsluvirksemi sítt, umframt stakroyndir og aðrar upplýsingar um undirgrundina, hann hevur savnað í virksemi sínum.
Stk. 2. Í loyvum eftir § 6 kunnu ásetast reglur um trúnað viðvíkjandi teimum frágreiðingum og upplýsingum, nevndar eru í stk. 1.

§ 12. Í loyvum eftir § 6 verður ásett, við fyrivarni fyri reglunum í §§ 20 og 21, í hvønn mun skyldur loyvishavans standa við eftir at loyvisskeiðið er runnið, loyvtø latið innaftur ella tikið aftur. Harafturat kann verða ásett, at landsstýrið, um arbeiðsskylda ella aðrar skyldur ikki eru loknar, kann krevja, at loyvishavin fult ella fyri ein part rindar tað upphædd, sum tað hevði kostað at lokið skyldurnar.

B. Virksemið

§ 13. Leitingar- og framleiðsluvirksemið skal vera forsvarligt og skynsamiligt og samsvarandi viðurkendari góðari altjóða venju undir líkum umstøðum. Virksemið skal vera umhvørvisliga og tryggdarliga

forsvarligt, og soleiðis at tað slepst undan kolvetnisspelli. Hóskandi atgerðir skulu setast í verk so tað slepst undan at skaða dýra- og plantulív og at dálka umhvørvið. Virksemið skal ikki vera til óneyðugan vanda ella tarn fyri skipaferðslu, loftferðslu, fiskiskap ella annað virksemi ella eitt skaða ella skaðavalda fyri rørleiðingar, kaðalar ella annan útbúnað.
Stk. 2. Viðgerðarstøðir, rørleiðingar og aðrar flutningsskipanir eiga at hava hóskandi støddl og leggjast soleiðis, at undirstøðukervið sum heild verður virkisført.

§ 14. Leiti- og aðrar boringar í undirgrundini mega ikki verða byrjaðar uttan so, at landsstýrið frammanundan hevur góðkent útgerð, arbeiðsætlan og mannagongd.
Stk. 2. Loyvishavin kann bert stovna havstøð ella virki og útbúnað á landi at brúka til kolvetnisframleiðslu og fara undir framleiðslu, um landsstýrið frammanundan hevur góðkent eina leiðbeiggiætlan sum nevnd er í stk. 3, hertundir framleiðslufyrireikingar og -gongd og tann útbúnað, ið nýtast skal.
Stk. 3. Ger loyvishavi av at úthyggja og framleiða ein kolvetnisfund, skal hann gera eina ætlan (leiðbeiggiætlan), ið skal sendast til góðkenningar eftir stk. 2. Í ætlanini skulu vera upplýsingar og metingar um kolvetnisfundin og útvinning av honum, umframt upplýsingar og metingar av tøkniligum, fíggjarligum, trygdarligum, umhvørvisligum slagi og um fiskivinnu og siglingarviðurskifti samtan við einari frágreiðing um týdningin av byggiætlanini fyri búskap og arbeiðsvinnu. At enda skal vera greitt frá, hvussu virki og útbúnaður kunnu verða frágingin, tá virksemið verður niðurlagt. Verður bygt í tveimum ella fleiri umførum, eigur ætlanin, so langt til ber, at fata um alla byggingina.
Stk. 4. Góðkenning landsstýrisins av leiðbeiggiætlanini, herundir seinni góðkenningar av serskildum byggistigum og støkum virkjum og virkislutum eftir reglum, givnar sambært § 24, skal vera fingin áðrenn gingið verður í munandi sáttmálabundnar skyldur, uttan so at landsstýrið frammanundan gevur sítt samtykki.
Stk. 5. Talar fyrilit fyri forsvarligari og skynsamiligari framleiðslu fyri tí, ella er tað neyðugt orsakað av týdningarmiklum samfelagsáhugamálum, kann landsstýrið gera broytingar í góðkendum framleiðsluætlanum og laga framleiðsluna samsvarandi til.

§ 15. Røkkur kolvetnisfundur um øki hjá fleiri loyvishavum, skulu teir samskipa leiting og møguliga framleiðslu. Slíkar avtalur skulu góðkennast av landsstýrinum. Fæst ikki semja um samskipan innan rímiliga tíð, kann landsstýrið geva boð um samskipan og áseta treytirnar.
Stk. 2. Røkkur kolvetnisfundur inn á landgrunn ella yvirvaldsøki hjá øðrum landi, kann landsstýrið, verður avtala um samskipan av leiting og framleiðslu gjørd við hetta landið, geva honum, ið loyvi hevur til føroyska partin, boð um at taka lut í tílíkari samskipan og áseta treytirnar.

§ 16. Eiga tveir ella fleiri kolvetnisfundir at verða samtroyttir av tí at fyrilit fyri tilfeingi, búskapi ella samfelagsáhugamálum tala fyri tí, kann landsstýrið, tá ið tað hevur ráðført seg við loyvishavarnar, geva boð um at hetta verður gjørt. Í hesum sambandi kann áleggjast loyvishava móti gjaldi at lata viðgerðar- og flutningsbúnað til nýtslu í tílíkum samstarvi. Semjast loyvishavarnir ikki um gjaldið, verður tað ásett av landsstýrinum.

§ 17. Kolvetni, ið ikki eru brúkt í framleiðsluni, sprend innaftur, brend ella farin fyri skeytið, skulu takast í land í Føroyum, uttan so at landsstýrið góðkennir annað. Landsstýrið kann áseta treytir fyri góðkenningini.

C. Rørleiðingarskipanir

§ 18. Loyvi landsstýrisins krevst til tess at leggja og reka rørleiðingarskipanir at brúka í virksemi, fevnt av hesi lóg.
Stk. 2. Í einum loyvi kunnu setast treytir um rørlegu, støddir, ognarviðurskifti, arntara rætt at brúka rørleiðingina, gjald v.m.
Stk. 3. Stk. 1 og 2 eru ikki galdandi fyri innanhýsis rørleiðingar í framleiðslunútbúnað á stakari leið.
Stk. 4. Røkkur rørleiðingin inn á landgrunn ella yvirvaldsøki hjá øðrum landi, kann landsstýrið, verður avtala gjørd við hetta landið um at leggja og reka rørleiðingina, geva honum, ið loyvi hevur til føroyska partin, boð um at taka lut í avrádda samstarvinum og áseta treytirnar.

§ 19. Loyvi landsstýrisins krevst til tess at leggja og reka undirsjóvar rørleiðingarskipanir til millumlandaflutning á føroyskum landgrunnsøki. Í góðkenningini skal tilskilast, hvar hesar rørleiðingar verða lagdar og treytir skulu setast um rímiligar atgerðir við atliti at leitingarvirksemi á landgrunninum, gagnnýting av náttúruríkidømi hansara og fyri-

byrging, avmarking og eftirliti við dálking frá nærleiðingum.

D. Avrigging av virksemunum

§ 20. Hildið kann einans verða endaliga uppat við rakstri og viðlíkahaldi av havstøð til framleiðslu, eftir at landsstýrið frammanundan hevur givið sína góðkenning. Loyvishavin skal við freist eftir stk. 3 leggja eina avriggingarætlan fyri landsstýrið við neyðugum upplýsingum og metingum um tøkni, trygd, umhvørvi, fiskiskap, sigling og búskap saman við uppskoti um hvussu havstøðin kann verða frágingin.

Stk. 2. Havstøðin skal samsvarandi altjóða reglum framhaldandi verða brúkt í kolvetnisvirksemi sum bært hevur tóg, til annað endamál ella burturbeinast heilt ella partvís. Loyvishavin skal fremja avriggingarætlanina innanfyri ta freist og samsvarandi teimum treytum, landsstýrið hevur sett í góðkenning síni av ætlanini. Rennur freistin frá tí at hildið verður uppat at brúka havstøðina, skal loyvishavin boða landsstýrinum frá, tá hildið verður uppat.

Stk. 3. Avriggingarætlanin skal sendast inn í seinasta lagi tvey ár innan loyvishavin roknar við at hildið verður uppat at brúka havstøðina. Sama er galdandi um loyvisskeið eftir §§ 6 og 18 í hesi lóg eru runnin, hendir tað áðrenn roknað er við at halda uppat, Landsstýrið kann krevja avriggingarætlanina fyrr. um umstøðurnar tala fyri tí. Somuleiðis kann landsstýrið til hvørja tíð geva loyvishavanum boð um at prógva førleika sín at tíggja avriggingarætlanina ella veita neyðuga trygd, metir landsstýrið seg at hava grund til at halda, at loyvishavin ikki fer at hava neyðuga pertingin tøkan.

§ 21. Tá skeiðið í loyvi eftir §§ 6 ella 18 er runnið, loyvið lutið innaftur ella tikið aftur, hevur tað almenna rætt til uttan viðurgjald at yvirtaka viðkomandi útbúnað. Sama er galdandi, tá hildið er endaliga uppat at brúka útbúnað, ið burturav er ætlaður til brúks á ávísa økinum.

Stk. 2. Rættur hins almenna eftir stk. 1 verður útintur av landsstýrinum. Avgerðin verður boðað loyvishavanum í sambandi við at landsstýrið tekur støðu til avriggingarætlan hansara eftir § 20 og hevur í seinasta lagi gildi tá 6 mánaðir eru farnir frá tíðini eftir stk. 1.

Stk. 3. Loyvishavin skal siggja til, at búnaðurin við útgerð og neyðugum tilhoyri og tilfari verður avhendur tí almenna í forsvarliga viðlíkahildnum standi og leysur av møguligum skuldbindingum og øllum triðjamannsrættindum. Tílíkat skuldbindingar og tílík rættindi detta burtur mótvegis tí almenna.

Kapittul 4
Meting um fylgjur fyri umhvørvið

§ 22. Loyvi ella góðkenningar eftir §§ 14, 18, 19 ella 20 viðvíkjandi verkætlanum, ið ætlandi fara at ávirka umhvørvið munandi, kunnu bert verða veitt eftir at mett er um umhvørvisligu avleiðingarnar, og eftir at avvarandi almenningur, myndugleikar og felagsskapir hava fingið høvi at siga sína hugsan.

Stk. 2. Landsstýrið kann veita undantak frá kravinum eftir stk. 1, tala umstøðurnar fyri tí.

Stk. 3. Landsstýrið kann áseta reglur um, at avvarðandi almenningur, myndugleikar og felagsskapir skulu fáa boð og verða hoyrdir.

Kapittul 5
Arbeiðsumhvørvi, trygd og tilhúgving v.m. á havstøðum.

§ 23. Loyvishavin, fyristoðufelagið, stjórin á havstøðini, arbeiðstakarar, undirarbeiðstakarar og aðrir arbeiðsgevarar skulu, hvør í sínum lagi, síggja til at arbeiðsumstøðurnar eru fult forsvarligar til trygd og heilsu, og at dygt eftirlit er við at arbeiðið verður gjørt forsvarliga.

§ 24. Landsstýrið kann, til tess at varða um trygdar-, heilsu- og umhvørvisatlit í sambandi við kolvetnisleiting, -framleiðslu og/ella -flutning, áseta nærri reglur fyri havstøðir, herundir reglur um:

a) vanligar skyldur hjá arbeiðsgevarum, formonnum, arbeiðstakarum og útvegarum v.m.,
b) skjalfesting viðvíkjandi heilsu- og trygdarviðurskiftum, eftirlitsskipanir, ið kunnu vera innaneftirlits- ella aðrar líkar skipanir, prógvskjalaskipanir, og trygdarbygnað annars,
c) gerð av virkjum og útgerð, góðkenning og loyvi til byggiframleiking, bygging, innleggingar, brúk og burturbeining,
d) trygdar-, heilsu- og umhvørvisviðurskifti, arbeitt verður undir,
e) útbúgving og upplæring, hvíklartíð, frítíð, aldurskrøv og heilsukanningar.

§ 25. Á mannaðum havstøðum skal eigarin ella brúkarin tilnevna stjóra, ið hevur hægsta myndugleika á støðini í øllum lutum.

Stk. 2. Eigari ella brúkari av havstøð skal gera manningar- og verkskipan, ið sigur hvør stjórin er, hvørjir hava ábyrgdina av teimum ymisku høvuðsseminguum í rakstrartrygdini og ásetir leiðbeinandi reglur fyri samstarvi teirra, ið ábyrgdina hava.

Stk. 3. Landsstýrið kann, til tess at vissa sær at trygdin er í lagi, krevja at fáa ta í stk. 2 nevndu ætlan til góðkenningar og áseta gjøllari mantingarreglur.

§ 26. Eigari ella brúkari av havstoð skal halda dygga tilbúgving til verju fyri vanlukku ella vanda, ið kunnu valda fólkaskaða ella deyða, umhvørvisdálking ella tingskaða. Eisini skal hann síggja til, at neyðug útgerð til eyðflytingar og bjargingar umfram ávaringar og ljanskifti er til taks. Hann skal í tílíkum førum skípa fyri neyðugum atgerðum at forða ella minka um fólkavanda og skaðafylgjur.
Stk. 2. Landsstýrið kann taka avgerð um ella áseta nærri reglur um tilbúgvingina, herundir um manning og útgerð, sum eigarin ella brúkarin skal hava til taks, hendir óhapp á stoðini og um at fleiri loyvishavar skulu samstarva um tilbúgving. Í vanlukkuella vandastøðu kann landsstýrið taka avgerð um at seta í verk bjargingartiltøk ella atgerðir at vinna á vanlukkuni og um, at aðrir skulu koma við neyðugari tilbúgvingarútgerð fyri eigarans ella brúkarans rokning.

§ 27. Rundan um havstøðir, tó ikki rorleiðingar, skulu vera trygdarøki. Landsstýrið ásetir víddina samsvarandi galdandi altjóða reglum og kann gera fyriskipanir um sigling, fiskiskap og flúgving á økjunum, herundir banna óviðkomandi skipum og flogførum at koma inn á økini.
Stk. 2. Landsstýrið kann av trygdargrundum áseta reglur um avmarkingar av uppankring og fiskiskapi við undirsjóvar rørleiðingar.
§ 28. Er álvarslig vanlukka hend orsakað av virksemi, ið kemur undir hesa lóg, ella tilburður, ið kundi elvt slíka vanlukku, ella munandi tingskaða, ella sjódálking, kann landsstýrið seta skaðanevnd at kanna og meta um hendingina og skriva frágreiðing. Landsstýrið kann áseta nærri reglur um virksemi nevndarinnar.
Stk. 2. Skaðanevndin hevur loyvi at kanna havstøðina ella leivdirnar av henni.
Stk. 3. Skaðanevndin kann krevja, at bøkur og annur skjøl, ið hava týdning fyri kanningina, verða framløgd, og kann avhoyra eigaran ella brúkaran av havstøðini, starvsfólk og hvønn tann, ið verður hildin at kunna koma við upplýsingum, ið hava týdning fyri kanningina.
Stk. 4. Skaðanevndin kann krevja avhoyring í rættintum samtbært reglunum í rættargangslógini.

Kapittul 6
Myndugleikaviðgerð og eftirlit v.m.

§ 29. Landsstýrið kann áseta gjøllari reglur um virksemi samtbært loyvum eftir §§ 4, 6, 18, 19 og 20.

§ 30. Landsstýrið savnar allar tøkar upplýsingar um undirgrundina, ið fáast til vega í virksemi eftir hesi lóg.

§ 31. Landsstýrið hevur eftirlit við, at lógin og reglur og treytir settar samtbært lógini verða hildnar.
Stk. 2. Landsstýrið kann áseta nærri reglur um eftirlit, góðkenning av stakroyndum og øðrum prógvum fyri, at reglur um trygd, heilsu og umhvørvi eru hildnar.
Stk. 3. Landsstýrið kann heimila lands- og øðrum almennum stovnum at umsita heimildir, ið lógin gevur landsstýrinum.
Stk. 4. Loyvishavarnir rinda úreiðslurnar av viðgerð myndugleikanna av málum um loyvt og góðkenning v.m. til virksemi eftir hesi lóg, og av eftirlittnum eftir stk. 1 samtbært reglum, ásettum av landsstýrinum.

§ 32. Loyvishavar, eigarar ella brúkarar av havstøðum skulu lata allar upplýsingar, landsstýrið heldur vera neyðugar til eftirlitið við virksemi teirra eftir hesi lóg.
Stk. 2. At fremja eftirlitið kann landsstýrið áleggja loyvishava at lata inn stakroyndir, rátilfar, viðgerðarúrslit, talkingar og metingar umframt tøkniligar og búskaparligar upplýsingar.
Stk. 3. Har tað er neyðugt til eftirlits, hava starvsfólk eftirlitsmyndugleikans til hvørja tíð, uttan dómsúrskurð móti neyðugum samleikaprógvi atgongd til allar partar av fyritøku, har virksemi er eftir hesi lóg.
Stk. 4. Tað liggur á eigara ella brúkara av havstøð eins og teimum, ið virka teirra vegna, at geva starvsfólki eftirlitsmyndugleikans alla neyðuga hjálp í kanningarvirksemi teirra.
Stk. 5. Umboð fyri eftirlitsmyndugleikan hava rætt at taka lut sum eygleiðarar á fundum í samstarvsnevndum hjá loyvishavum, sum í felag hava fingið loyvi eftir § 6.

§ 33. Eftirlitsmyndugleikin kann geva boð um, at viðurskifti, ið eru ímóti lógini ella reglum og avgerð um samtbært lógini, verða fingin í rættlag beinanvegin ella innan nærri ásetta freist.
Stk. 2. Metir eftirlitsmyndugleikin, at tað er neyðugt til tess at forða hóttandi stórvanda fyri starvsfólkains ella annaru trygd ella heilsu ella fyri umhvørvisdálk-

ing, kann hann geva boð um, at beinanvegin skal verða gingið ímóti vandanum, herundir at arbeiðið verður steðgað.

Kapittul 7
Endurgjald og serligar reglur um skaðabøtur til fiskimenn

§ 34. Loyvishavin skal endurgjalda tap, ið stendst av skaða, dálkingarskaði frokaður, elvdur av virksemi sambært loyvinum, hóast skaðin stendst av tilvild.
Stk. 2. Hevur tann, ið varð fyri skaða, tilætlað ella av grovum ósketni, medvirkað til skaðan, kann endurgjaldið verða lækkað ella fella burtur.
Stk. 3. Endurgjald fyri dálkingarskaða kann verða lækkað ella fella burtur, verður tað prógvað, at náttúruhending, ið ikki slapst undan, krígs- ella yvirgangsatferð ella líkar tvingandi umstøður (force majeure) munandi hava medvirkað til ella økt um skaðan undir umstøðum, ið ikki kundi roknast við fóru at henda, og sum loyvishavin ikki hevði ræði á.
Stk. 4. Við dálkingarskaða skilst í hesi lóg skaði ella tap orsakað av dálking, elvdari av kolvetnisleysni ella -leka úr virki, havibotl frokað, og ðureiðslur til rímiligt tiltøk at forða ella avmarka tílíkan skaða ella tap, umframt skaða ella tap, ið standast av tílíkum tiltøkum. Skaði ella tap, sum eigarar, reiðarar og manning á fiskiskipum hava verið fyri orsakað av skerdum fiskimøguleikum, verða eisini mett at vera dálkingarskaði.

§ 35. Verða føroyskir eigarar, reiðarar og manning á fiskifórum fyri tapi, ið má metast at stava frá kolvetnisvirksemi til havs sambært hesi lóg, og ikki gerst av hvør skaðan valdi, sml. § 34, skulu loyvishavarnir við samábyrgd veita skaðabøtur fyri skaða á fiskireiðskap, -skip, og fer umframt veiðumiss og mista fiskitíð. Sama er galdandi fyri mista fiskitíð í sambandi við merking, upptoku og uppskiping av lutum, ið stava frá virksemunum. Loyvishavar kunnu stovna skaðabótagrunn við tí endamáli at gjalda krov eftir hesi reglu, áðrenn farast kann eftir loyvishavunum.

§ 36. Loyvi ella góðkenning eftir §§ 14, 18, 19 ella 20 til fyritakssemi á sjóðkinum og landgrunninum, sum verður til hindurs ella ampa fyri fiskiskapi, ið vanliga hevur verið rikin av føroyskum fiskifórum har á leiðini, verða ikki givin, uttan so at landsstýrið samstundis tekur avgerð um at loyvishavin veitir eigarum, reiðarum og manning, hvørs fiskimøguleikar verða skerdir av fyritakssemunum, skaðabøtur, ella landsstýrið hevur sent skaðabótanevndini eftir § 37 málið til avgerðar.

§ 37. Ein skaðabótanevnd við 5 limum gerr av um tap er ella verður vald, og um skaðabøtur eiga at verða veittar eftir § 35 ella, tá landsstýrið hevur sent nevndini mál til viðgerðar, eftir § 36. Loyvishavarnir uppnevna í felag 2 limir, meðan felagsskaptr umboðandi føroyskar skipaeigarar, reiðarar og manning á fiskifórum í felag uppnevna 2 limir. Partsumboðini í nevndini uppnevna í felag nevndarformannin, ið skal lúka treytirnar fyri at gerast landsdómari. Fæst ikki semja um formannin, verður hann uppnevndur av sorinskrivaranum.
Stk. 2. Loyvishavarnir rinda úreiðslurnar til skaðabøtur og rakstur av nevndini sambært reglum, ið landsstýrið ásetir. Landsstýrið kann gera av, at gjald skal rindast fyri viðgerð av málum í nevndini. Í aðrar máttu er gerðarrættarlógin galdandi. Landsstýrið kann harumframt áseta reglur um skaðabótagrunn, sml. § 35.

Kapittul 8
Aðrar áseti ngar

§ 38. Loyvi eftir hesi lóg eru undantikin rættarsókn og kunnu hvørki beinleiðis ella óbeinleðis avhendast uttan so at landsstýrið gevur loyvi til tess og góðkennir treytirnar.

§ 39. Landsstýrið kann taka eitt loyvi aftur
a) verða lógin, reglur ásettar sambært lógini, treytir og boð brotin grovliga ella ferð eftir ferð,
b) verða í umsókn um loyvi givnar skeivar ella villleiðandi upplýsingar,
c) boðar loyvishavin frá gjaldsstaðgi, biður um samráðingar um neyðskuldarsemju, fer á hústsagang ella í likvidatión ella kemur í líka støðu.

Stk. 2. Fær loyvishavin høtt fyri sær, tekst loyvið ikki aftur eftir stk. 1, litra a, fyrr enn landsstýrið hevur givið boð um at viðurskiftini skulu verða rættað innan ávísa freist, og boðini eru ikki fylgd.

§ 40. Í loyvi kann ásetast, at ósemja millum landsstýrið og loyvishavan um, hvort reglur ella treytir sambært hesi lóg ella í reglum ásettum sambært lógini ella í loyvi ella góðkenning, eru loknar, kann verða løgd fyri gerðarrætt til endaliga avgerð.

§ 41. Tá ræður um reglurnar í sjólógini um avmark-

ing av ábyrgd fyri flytandi havstøðin, ið sjólógin fatar um, ábyrgist reiðarin, um ábyrgd er avmarkað, við upp til 20 milliónum SDR, sama hvussu stór havstøðin er. Ræður um fólkaskaða verður hendan upphæddin hækkað við 12 milliónum SDR.

Stk. 2. Endurgjald fyri dálkingarskaður av kolvetnisvirksemi bevur ikki sjóveð eftir reglunum í sjólógini.

Stk. 3. Hevur reiðarin loyvi eftir § 6 til leiting eftir og framleiðslu av kolvetnum, gilda reglurnar um avmarking av ábyrgd reiðarans ikki.

§ 42. Landsstýrið kann sum neyðugt er loyva, at føst ogn verður ognartikin tit virksemi eftir hesi lóg.

Stk. 2. Kanningar, ið ikki taka langa tíð, og sum hava til endamáls at fremja fyritakssemi eftir hesi lóg, kann landsstýrið loyva á annansmans ogn, hóast tað kann hava við sær skaða ella ampa, ið fult endurgjald verður at veita fyri.

Stk. 3. Ognartøka eftir stk. 1 verður framd samkvæmt reglunum í lóg nr. 63 frá 7. mai 1881 um skyldu at lata lendi til almennar vegir, havnir og lendingar umfram almennar skúlar í Føroyum. Sama er galdandi fyri avgerðir eftir stk. 2. Fæst ikki semja um endurgjaldið.

Kapittul 9
Revsing og gildiskoma

§ 43. Við bót ella hefti verður hann revsaður, sum

a) rekur virksemi nevnt í §§ 4, 6, 18 og 19 uttan loyvi landsstýrisins,
b) riggar virkið av uttan góðkenning landsstýrisins eftir § 20, stk. 1 ella letur ikki ráðstandis inn nøktandi avriggingaravtalu eftir § 20, stk. 3,
c) brýtur §§ 23, 25 ella 26, ella letur ikki inn stak royndir og aðrar upplýsingar eftir § 11, ella forðar fyri kanning, nevndar í § 28, stk. 2,
d) aktar ikki boð, givin eftir hesi lóg ella fyriskipanir, ásettar við heimild í lógini,

Stk. 2. Verður § 23 brotin, kann arbeiðsgevari bøta, sjálvt um brotið ikki er framt tilfarlað ella av ósketni.

Stk. 3. Í fyriskipanum, ásettum við heimild í lógini, kann ásetast revsing, sum bót ella hefti fyri brot av reglunum í fyriskipanunum. Hesini kann ásetast, at arbeiðsgevari, sum brýtur reglurnar, boð ella forboð sum ásett, kann bøta, sjálvt um brotið ikki er framt tilfarlað ella av ósketni. Ónskiftisrevsing verður ikki ásett fyri bót.

Stk. 4. Verður brotið framt av partafelagi, smápartafelagi, hlutafelagi ella tílíkum felagum, kann bótin verða kravd av felagnum sjálvum.

§ 44. Avgjald og ágávur samkvæmt hesi lóg kunnu krevjast inn við pantíng

§ 45. Henda lóg kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

Stk. 2. Løgtinglóg nr. 179 frá 21. oktober 1993 um forkanningar o.a.m. av undirgrund Føroya verður sett úr gildi.

ALMENNAR VIÐMERKINGAR

1. Endamálið við lógaruppskotinum er at skapa eitt tíðarhóskandi stoðli undir byrjandi leiting eftir og møguligari seinni gagnnýting av kolvetnistilfeingi í undirgrund Føroya. Roynt verður at skapa fortreytir fyri at fáa staðfest, um olja og jarðgass finst á føroyskum lands- og sjóøki og á føroyska landgrunninum, og at skapa trygd fyri varisligari og skynsamari gagnnýting av tílíkum fundum til gagns fyri føroyska búskapin og arbeiðsvinnu í Føroyum.

2. Ein fortreyt fyri lógaruppskotinum er løgtingssamtyktin frá 24. september 1993 um leiting eftir olju og jarðgassi á føroyskum síki (løgtingsmál nr. 5/1993). Løgtingið tók í hesi samtyktini undir við landsstýrinum í, at tað lógarfyrireikandi og útgreinandi arbeiðið, ið byrjaði á vári 1993, helt fram og at uppskot vórðu gjørd til nútímans undirgrundarlóg og aðra neyðuga lóggávu umframt uppskot til framtíðar treytir fyri leitingar- og útvinningarloyvum. Løgtingið staðfesti harafturat, at innan langt umleið átti at verða skipað fyri fyrstu útbjóðingarumfarinum til veitingar av loyvum til leiting eftir og útvinning av olju og jarðgassi. Fyrst áttu tó forkanningar at verða gjørdar at lýsa jarðfrøðiligu uppbyggingina av landgrunninum, og víddan av honum at vera staðfest í samráðingunum við Stórabretland.

3. Um somu tíð, sum løgtingið gjørdi omanfyri nevndu samtykt, varð uppskot landsstýrisins til løgtingslóg um forkanningar o.a.m. av undirgrund Føroya samtykt (løgtingslóg nr. 179 frá 21. oktober 1993). Við heimild í lógini vórðu á vár 1994 loyvi givin Western Geophysical Corporation at gera viðtøknar seismisk-

ar økiskanningar, serstakliga av havleiðunum eystanfyri og sunnanfyri Føroyar. Tær uniðvísu kanningarnar, ið tá vórðu gjørdar, eru síðan fylgdar av einari rað av forkanningum, figgjaðar av bæði seismikkfeløgum og oljufeløgum. Fáa bólkur av oljufeløgum hevur harnæst við Dansk Olie- og Gasproduktion A/S sum fyristøðufelagi í 1996 gjørt eina kanningarboring til lands í Lopra at útvega meira jarðfrøðiliga vitan. Haraftrat bað Oljuráðleggingarnevndin, sum landsstýrið setti tann 22. apríl 1994, í 1996 um tilmæli frá oljufeløgum um tey øki á føroyska landgrunninum, ið felagini hildu áttu at vera tikin við í fyrsta útbjóðingarumfarið. Svarini frá feløgunum benda á, at stórur áhugi er fyri víðum økjum bæði eystanfyri og sunnanfyri Føroyar.

4. Við tí, sum omanfyri er greitt frá, í huga, heldur landsstýrið at tey úrslit, ið fingin eru burturúr teimum kanningum, ið higartil eru gjørdar, benda á at fortreytirnar fyri fyrsta útbjóðingarumfarinum á føroyskum øki skuldu verið reiðiliga góðar. Samráðingarnar við Stórabretland um landgrunnsmarkið, sum hava verið førdar síðan 1991, eru framvegis ikki endaðar. Fortreyt løgtingsins um greiðu á markinum áðrenn skipað verður fyri einum úthjóðingarumfari, er tí ikki lokin. Lógaruppskotið verður hóast hetta lagt fram til tess at skapa neyðuga lógarkarmin, soleiðis at til ber at hava eitt úthjóðingarumfar so skjótt umstøðurnar loyva tí.

5. Umframt omanfyri nevndu løgtingslóg um forkanningar o.a.m. er galdandi lóggáva í dag í Føroyum lóg nr. 181 frá 8. mai 1950 um leiting eftir og útvinning av ræevnum í undirgrund Danmarkar kongsríkis. Lógin, ið samsvarar grein 11 er galdandi í Føroyum við teimum avmarkingum, ið standast av lóg nr. 137 frá 23. mars 1948 um heimastýri Føroya, kom í gildi í Føroyum tann 5. februar 1952 og verður verandi í gildi, eftir at málsøkið "ræevni í undirgrundini" gjørdist føroyskt sermál samsvarandi avtalu frá 22. december 1992, inntil hon verður broytt ella sett úr gildi við løgtingslóg, hvørji tá verður lógin eftir fastari venju lisin á tann hátt, at løgting og landsstýri hava tann nyndugleika, ið samsvarar lógini er hjá donsku sjórmini og fólkatinginum, tá tað ræður um mál, ið eru yvirtikin sum sermál. 1950-lógin, sum í Danmark er avloyst av lóg nr. 293 frá 10. juni 1981 um gagnnýting av undirgrund Danmarkar, er ikki brúkilig sum støði undir nútímans og framtíðar olju- og jarðgassvirksemi.

6. Lógaruppskotið byggir á tað lógaruppkastið, ið Oljuráðleggingarnevndin legði fram í frágreiðing sínari frá juli 1997.

7. Í uppskotinum verður skottið upp, at forkanningarlógin frá 1993 verður sett úr gildi og at samsvarandi reglur í kapitli 2 í uppskotinum koma í staðin, og at leiting eftir og framleiðsla v.m. av kolvetnum í framtíðini verða gjørd sambært reglunum í uppskotinum. 1950-lógin fer síðan bert at galda fyri onnur ræevni enn kolvetni, ið hendan lógin fevnir um. Tað merkir sambært grein 1 í lógini onnur ræevni enn kolvetni, ið ikki vórðu gagnnýtt av privatum fyri 23. februar 1932. Torført er at siga, um gamla lógin herefter hevur nakað veruligt nýtsluøki, av tí at "námsvinna", sum hon hevur verið rikin í nógv ár í Suðuroy, altíð hevur verið mett at vera føroyskt sermál og tí ikki undir 1950 lógini. Fyri kortini ikki at skapa møguligt "rettarloysi", verður í hesum lógaruppskotinum ikki skottið upp at seta 1950 lógina úr gildi.

8. Lógin um kolvetnisvirksemi et ein rammulóg, ið setir reglur fyri bæði veiting av loyvum, t.v.s. neyðugt loyvini til oljufeløgini at leita eftir og framleiða ráolju og jarðgass, og til skeiðini í virksemintum, t.v.s. leiting og meting, bygging og framleiðslu umfrant avrigging av virksemintum. Haraftrat eru serligar reglur í lógini um havstøðir, t.v.s. tær innretingar og tann tilbúnaður umframt stoðufost fór, ið nýtt verða í virksemintum. Hesar serligu reglurnar svara til reglurnar í arbeiðsumhvarvis- og trygdarlóggávuni á landi og í lóggávuni um trygd á skipum. At enda eru eisini reglur í lógini, sum í Danmark finnast í landgrunslógini.

Í lógini eru reglur, sum í Danmark og øðrum Norðsjóvarlondum finnast í fleiri ymsum lógum. Endamálið við at savna hesar reglur í eina lóg hevur verið at skapa eitt so einfalt og greitt lógargrundarlag sum gjørligt undir virksemintum, ið gevur landsstýrinum allar tær heimildir, ið nútímans lóggáva á økinum vanliga gevur myndugleikunum, og sum er so lætt at umsita sum yvirhøvur gjørligt. Oljuráðleggingarnevndin hevur annars við lógaruppskotinum roynt at fáa tey málsevni við, sum í Norðsjóvarlondunum eru skipað í lóg.

Hinvegin er ikki roynt í lógaruppskotinum at taka avgerð um tann føroyska kolvetnispolitikkin. Lógin setir

varandi kunnar um virksemið, meðan oljupolitikkurin í verki verandi verður tilrættur so hvørt sum útboðið verður, sama tá talan er um hvørji øki verða bjóðað út til leitingar, ella fíggjarligar og aðrar treytir, ið samsvarandi kapitul 3, A, í lógini verða settar í teimum loyvum, ið givin verða oljufeløgunum.

9. *Høvuðsvreiðini* í lógini um kolvetnisvirksemi eru hesi:

a) § 3 í lógini ásetir samsvarandi galdandi ræði, at kolvetni, sum eru allýst í § 2, fyrra a, hoyra Føroyum til og at onnur enn landið einans kunnu leita ella framleiða við loyvi sambært lógini. Hinvegin kann landsstýrið sjálvt fara undir tílíkt fyritaksemi, treytað av at neyðugur peningur er játtaður og møguligt krov í aðrari lóggávu lokin. Endamálið við lógini er tí at skapa heimild fyri og nærri at skipa, hvussu onnur enn landsstýrið, og í fyrsta tagi útlendsk oljufeløg, kunnu sleppa at leita eftir olju og framleiða hana á føroyskum øki.

b) Reglurnar í kapittli 2 (§§ 4 og 5) um forkannингar o.a.m. svara til reglurnar í galdandi forkannингarlóg frá 1993, tó í nýggju lógini avmarkaðar til bert at galda fyri kolvetni. Endamálið við tílíkum innleiðandi kannингum, serliga seismiskum kannингum, er at royna at fáa greiðu á, um grundir eru til at fara undir veruliga leiting, ið vanliga er ógviliga kostnaðarmikil, á eittum øki.

c) Loyvisveitingarskipanin er ásett í kap. 3, petti A (§§ 6-12). Mannagongdin í sambandi við fyriskipan av útbjóðingarumførum og veiting av loyvum at leita eftir og framleiða olju og jarðgass hevur alstóran týdning. Tað er landsstýrismaðurin, ið hevur málsøkið undir sær, ið sambært lógini hevur heimild at veita oljuloyvi landsins vegna. Sambært grein 7 í lógini kunnu tílík loyvi sum høvudsregla ikki verða veitt fyrr enn alment hevur verið lýst eftir umsóknum, og løgtingið hevur fingið frágreiðing um, hvørji øki landsstýrið ætlar at bjóða út og hvørjar høvuðstreytir ætlanin er at seta fyri loyvunum. Eftir at umsóknir eru innkomnar er tað landsstýrismaðurin, ið hevur ábyrgdina av viðgerðini av teimum og av teimum samráðingum, ið Oljufyrisitingin hevur við umsøkjararnar, áðrenn loyvini verða givin.
At málini fyrst skulu leggjast fyri løgtingið er í samsvari við venjuna í eitt nú Noregi og Danmark um parlamentariskt eftirlit við myndugleikunum á hesum týdningarmikla økinum. Í báðum londunum verða avgerðir um at bjóða nýggj øki út hildnar at hava stóran týdning, tí hóast óvist er um nakað verður funnið, er ein tílík útbjóðing eitt týdningarmikið ambað í stýringini av fyritaksemiunum sum heild og samfelagsligu avleiðingunum av virksemiunum. Hildið verður at tað samsvarar best við reglurnar í stýrisskiparlógini um viðurskiftini millum landsstýrið og løgtingið, at frágreiðingin um ætlaðar útbjóðingar verður løgd fyri løgtingið at fáa at vita, um løgtingið tekur undir við ætlanum landsstýrisins. Er meirilutin í løgtinginum móti at boðið verður út við teimum treytum, ið skotmar eru upp, verður útbjóðingin ikki ólóglig, men viðkomandi landsstýrismaður kann tá koma í vanda fyri mitsálitisvítan. Er hinvegin meirilutin fyri at skipað verður fyri útbjóðing, kann frágreiðingin verða tikin til eftirtektar.
Í §§ 8-12 er víst á nakrar týdningarmiklar spurningar í leitingarskyldur, avgjald, arbeiði í landinum o.t.l., sum støða í øllum førum skal verða tikin til í loyvunum, eins og áramálið, loyvini verða givin fyri, mái vera í samsvari við tíðaravmarkingarnar í § 8. Aðrar treytir kunnu verða settar av landsstýrinum enn tær, ið nevndar eru í lógini. Verður eitt nú avgerð tikin um, at eitt oljufelag, ið landið hevur stovnað, skal taka lut í virkseminum, kunnu reglur hesum viðvíkjandi verða tiknar við í loyvini samsvarandi § 6, stk. 2 í lógini.
Umframt luttøku av ovrum landsfelagi kunnu aðrir møguleikar fyri beinleiðis samstarvi millum landið og altjóða oljufeløgini um dagfiga virksemið eisini hugsast sambært lógini. Eitt nú kunnu nevnast "framleiðslubýtisavtalur", ið áseta at ávunnin olja verður býtt millum landið og eitt ella fleiri oljufeløg, tó fáa feløgini fyrst leitingar- og framleiðsluútreiðslurnar endurgoldnar. Teir sonevndu "tænastusáttmálarnir" eru ein annar møguleiki. Eitt serkenni við teimum er, at privata oljufelagið fær leitingar- og framleiðsluvirksemið goldið við rætti at keypa ein part av framleiddu kolvetnunum, møguliga fyri framhjápris. Í menningarlondum og í Latínameríka er almenni partarin ofta eitt felag, ið tað almenna eigur einsamalt.
Kapittul 3 í lógini byggir á tá í vesturheiminum vanligu "konsessiónsfyrisetningina", men setir í aðrar mátar bert nøkur krøv til innihaldið í leitingar- og framleiðsluloyvunum. Lógin byggir á tá skipan, at

veruligu avgerðirnar um val av nitlendskum samstarvsportum altið verða tiknar av landsstýrinum. Somuleiðis skal eitt loyvi sambært grein 6 í lógini liggja sum grund undir øllum virksemdunum, sama hvat lógfrøðiligt snið verður valt í hvørjum umfari.

Reglurnar í § 10 í lógini um arbeiðs- og vinnufremjandi politikkin eru grundaðar á tann hugsunarhátt, at stavnhaldið um kolvetnisvirksemi til framan fyri búskapin og arbeiðsvinnu í Føroyum (§ 1, stk. 2, 1. pkt.) eigur at verða stuðlað við at leggja skyldur á oljufelagini at taka undir við tí í verki. Álagt verður tí landsstýrinum, at høskandi treytir skulu vera við loyvunum hesum viðvikjandi. Orðingin av hesum reglunum í leitingar- og framleiðsluloyvunum er týðandi partur av upplýsingarumfori, ið leggjast skal fyri løgtingið sambært § 7, stk. 2 í lógini, áðrenn oljufelagini verða bjóðað at senda inn umsóknir. Sambært hesi lógargreinini skal frágreiðingin um hesi viðurskiftini m.a. meta um, hvat ikast kolvetnisvirksemið kann geva til búskap og arbeiði. Meðan § 10 verður umrødd skal at enda verða vist á § 14, stk. 3 og 4 um góðkenning av útbyggingaretlanum fyri leiðirnar, har krav verður frágreiðing um týdningin av útbyggingaretlanini fyri føroyska búskapin og arbeiðsvánirnar, eins og krav verður, at veitingar verða ikki umbiðnar fyrr enn landsstýrið hevur góðkent leiðbyggiaetlanina. Landsstýrið kann eisini hava vinnupolitisk sjónarmið í huga, tá umhugsað verður um undantaksloyvi skulu verða givin lut skyldumi sambært § 17 at taka oljutra í land í Føroyum.

d) Av reglunum um sjálvt kolvetnisvirksemið í kapittli 3, B, í lógini (§§ 13-17) er fyrst at nevna § 13 um almenna dygdarstigið, ið virksemið á føroyska landgrunninum skal lúka. Høvuðskravið er, at arbeiðast skal samsvarandi góðum yrkissiði, trygdarliga forsvarligt og við neyðugum fyrilit fyri umhvørvi og øðrum viðkomandi áhugamálum, fiskiskapinum íroknaðum. Eftirlitið við loyvishavunum sambært § 31, stk. 1 í lógini, ið Oljufyrisitingin hevur í hondum undir ábyrgd málsvegis landsstýrisnarnninum, hevur almennu leiðregluna í § 13 at halda seg til umfram tey nógvu nágreiniligari krovini í serreglum og loyvistreytum. Tær týdningarmiklu reglurnar um góðkenning frammanundan av boringum og uppseting av framleiðslu virkjum v.m. eru at finna í § 14. Tílíkar góðkenningar verða hildnar at vera neyðugar, bæði av tí at djúpar hátrýstboringar eru vandamiklar og krevja góðan sakkunnleika og royndir, skulu tær verða vandaliga gjørdar, av tí at tær eru av stórum áhuga í leitingini, og av tí at landsstýrið sjálvandi eigur at samtykkja í uppseting av úthúnað, ið skal standa í longri tíð á føroyskum oki. §§ 15 og 16 viðgera samskipanina av framleiðsluni úr einum lundi, ið levnir um oki hjá fleiri loyvishavum, eisini á landgrunni annara landa, og samskipan av framleiðsluni úr fleiri lundum, ið liggja nær hvørjum øðrum. At enda ásetir § 17 eina meginreglu um, at framleidd ríolja og jarðgass skal takast í land í Føroyum. Í nógvum førum, og serliga tá tað ræður um jarðgass, verður tað hvørki tøknifiga ella fíggjarfiga skilagott at føra kolvetnini til Føroya, og landsstýrinum er tí heimilað at samtykkja í, at tey verða send aðrar staðir. Roynt eigur kortini at verða at sleppa undan, at kolvetnisvirksemið á føroyska landgrunninum sum frá líður verður ovmikið einsíðis bundið av atgongd til rørleiðingar og oljustoðir hjá grannalondunum. Í samsvari við landsins áhugamál verður tí tann skipanin skotin upp, at framleiðslan bert fundamentalsfrøtum og við landsstýrisins loyvi kann verða tikin upp á land uttan fyri Føroyar. Á hendan hátt verður eisini møguligt hjá landsstýrinum at leggja treytir við, ið hava samband við vantandi vinnulívsframa fyri Føroyar orsakað av, at oljan ikki kemur upp í her.

e) Í kapittli 3, C og D, í lógini (§§ 18-21) eru reglurnar um stovnan og rakstur av rørleiðingum og um avrigging av virksemunum, tá framleiðslan heldur uppat. Landsstýrisins góðkenning frammanundan av tílíkum tiltøkum er neyðug av somu grundum, sum galdandi eru fyri útbyggingar av oljuleiðum sambært § 14, stk. 2 í lógini. Í hesum sambandi verður tað lutur landsstýrisins at tryggja, at rørleiðingin í størst møguligan mun gerst liður í einum skilagóðum heildarmiðstoðukervi til flutnings sum nevnt í § 13, stk. 2 í lógini. Reglurnar um rørleiðingarúthúnað heimila harafturat landsstýrinum at leggja treytir við, ið kunnu fyribyrgja at ein stóreigari av rørleiðingum misnýtir sína ráðandi stoðu og ræði á flutningskervinum til skaða fyri aðrar loyvishavar og landsins áhugamál, t.a.t. at funnin kolvetni kunnu verða framleidd undir vanligum fíggjarligum treytum. Reglurnar um avrigging av virksemunum, tá framleiðslan er hildin uppat ella eitt loyvisskeið runnið, skulu bæði tryggja at gingið verður um tann brukta útbúnaðin á skilagóðan hátt fíggjarliga, tøkniliga og umhvørvisliga, og at landið hevur rætt at taka við útbúnaðinum, um brúk framhaldandi er fyri honum í framleiðsluni ella til annur endamál. Roknað er við, at spurningar um avrigging verða viðgjørdir í hvørjum fori sum við stoði í uppskotum, sum loyvishavin letur myndugleikunum. Tílíkar avgerðir kunnu fáta stóra ávirkan á landskassan, annaðhvørt av tí at loyvishavin

kann draga útreiðslurnar frá í skattarokniskapinum, ella av teimum útreiðslum, ið standast av burturbeining av útbúnaði, ið verður yvirtikin av tí almenna.

f) Umframt vanligu myndugleikaheimildunum finnast í § 22 í 4. kapittli í lógini lyriskipanir um serligar metingar um fylgjur fyri umhvørvið og við møguleika hjá almenningunum at siga sína hugsan um virkisætlanir í hesum sambandi. Í viðgerðini av eitt nú málum um útbygging av leiðum og legging av rørleiðingum fer Oljufyrisitingin at hava umhvørvisviðurskifti í huga í vanligu málsviðgerðini og í hesum viðfangi at taka umhvørvismyndugleikarnar við í ráðum. Harafturat verður tað hildið at vera skilagott at tryggja í lógini, at bæði almenningurin og allir avvarðandi felagsskapir og myndugleikar fáa møguleika at siga sína hugsan, áðrenn loyvi verður givið. Tílíkar mannagongdir eru vanligar í okkara grannalondum og eisini gjøllari umrøddar í sonevndu VVM-direktivinum hjá ES (85/337 EØF). Tá talan er um eina serliga mannagongd, ið vendir sær til almenningin og byggir á eina serliga frágreiðing, verður skotið upp, at landsstýrið fær heimild at sleppa kravinum í serstøkum førum, har neyðugar upplýsingar longu eru til skjals í áður gjørdum árinsmetingum.

g) Reglurnar í kapittli 5 um arbeiðsumhvørvi, trygd og tilbúgving v.m. fyri havstøðir (§§ 23-28) hava til endamáls undir einum at skapa eina greiða skipan av øllum útbúnaði, ið verður nýttur í kolvetnisvirkseminum á landgrunninum. Vóru ongar tílíkar reglur, hevdu vit als ikki havt nakrar trygdar- og arbeiðsumhvørvisligar reglur fyri føst framleiðsluvirki og rørleiðingar til havs, meðan búnaður í sigling hevði verið undir skipasýnislóggávuni, ið verður umsitin av danska sjóvinnustýrinum (skipaeftirlitinum). Tað hevði borið til at sett arbeiðataverju- og brunalóggávuna, ið galdandi er á landi, í gildi fyri lastan frálandsútbúnað samsvarandi grundreglunni í § 3, stk. 2 í lógini. Men neyðugt hevði kortini verið at gjørt nýggjar serreglur afturat teimum, ið galdandi eru, og sum á mangan hátt eru ógviliga ytniskar til innihalds. Av tí at landsstýrið eigur at vera ført fyri at seta eina skipan í verk, ið fatar um alt trygdar- og arbeiðsumhvørvisliga økið, sama hvør útbúnaður nýttur verður, og tí tað er ein fortreyt fyri dyggum almennum eftirliti, at teir vandar, ið standast kunnu av ítøkum virkseminum, kunnu metast sum partar av støtri heild, verður kortini skotið upp, at serligar reglur verða gjørdar fyri "havstøðir", sum eru gjøllari lýstar í § 2, litra b) í lógini. Ofta verða tað einans tøkniligar ella fíggjarligar grundir, ið fara at gera av, um ein ávísur útbúnaður er fastur ella flytandi, og tí eiga somu trygdarreglur at vera galdandi, sama um tað snýr seg um fastan ella flytandi útbúnað, ið nýttur verður í oljuvirkseminum á sjónum. Hesar serligu reglurnar verða ikki galdandi á landi, tí har finst ikki tann serstaka samansetingin av sjóváða og ídnaðarváða, ið eyðkennir virksemið á sjónum. Harafturat kemur, at til ber ikki í dag at víta, um leitingar- og framleiðsluvirksemi kann væntast á fundi við teimum krøvum, ið hetta fer at seta til arbeiðaraverndarlóggávuna og -myndugleikarnar. Í kapittli 5 í lógini finnast, umframt ein almenn heimild at gera serreglur, serligar reglur um manning og fyriskipan í trygdarmálum, tilbúgving, trygdarøki og greining av sjóskaða.

h) Í lógarinnar kapittli 6 um myndugleikaviðgerð og eftirlit (§§ 29-33) eru serstakliga reglur um heimildir landsstýrisins sum eftirlitsmyndugleiki. Roknað verður við, at landsstýrið vanliga fremur myndugleika sín gjøgnum Oljufyrisitingina, men at hetta verður gjørt vegna tann landsstýrismannin, ið hevur ábyrgdina. Leiklutur landsstýrisins sum hægsti eftirlitsmyndugleiki krevur eina partleysa og sakligu umsiting, ikki minst í trygdarmálum, ið á sama hátt sum í øðrum londum skal lúkast samstundis sum landsstýrið veitir loyvi, skattleggur og umsitir landsins vinnubúskaparligu áhugamál. Í kapittli 6 finnast eisini reglur um skyldur loyvishavanna at endurgjalda landskassans útreiðslur av myndugleikaviðgerð og eftirliti og um rætt hjá eftirlitinum at senda umboð á fundir hjá samstarvsnevndum loyvishavanna (joint operating committees).

i) Í kapittli 7 um endurgjald og serligar reglur um skaðabøtur til fiskimenn (§§ 34-37) er dentur lagdur á partvís at skipa eitt fullgott og vanligt ábyrgdargrundarlag í teimum førum, har ein uttanfyri standandi verður fyri skaða av ávum teirra, ið reka oljuvinnu, og partvís at skapa eina serliga skipan um skaðabøtur til fiskimenn, ið verða raktir undir ávísum umstøðum, har eingin loyvishavi hevur borið seg at á ein hátt, ið ber endurgjaldsábyrgd við sær. Í fyrra førinum verður skotið upp, at ábyrgdin fyri skaðar, voldir av virkseminum, skal vera partleys ("objektiv"). T.v.s. at loyvishavin skal eisini endurgjalda henditligar skaðar um vanligur endurgjaldstreytir eru loknar, eitt nú at tað er prógvað at ein ávísur loyvishavi hevur volt skaðan, og at loyvishavin hevur borið so at í kolvetnisvirksemi sínum, at hetta var

orsøkin til skaðan. Hendan vanliga endurgjaldsreglan verður eisini brúkt í førum har hann, ið var fyri skaða, er fiskimaður. Uppískoytisskipanin um skaðabøtur minnir um skipanirnar í Danmark og Noregi og fyri ein part í Stórabretlandi, har royndirnar hava vist, at fiskinum kunnu verða fyri tapi, uttan at nakar ávísur loyvishavi kann sigast at vera atvoldin, hóast skaðin má haldast at vera voldur av oljuvirksemi. Hugsast kann, at barraleysir lutir á havbotninum skaða fiskireiðskap v.m. Harafturat kann uppseting av einum framleiðsluvirki forða fyri vanliga fiskiskapinum har á leiðini, soleiðis at minni fæst burturúr hjá fiskimonnum. Mál um skaðabøtur skulu verða avgjørd av einari serligari skaðahóttnevnd, har báðir partar eru umboðaðir, tó kunnu avgerðir í hesum málunum eftir umstøðunum verða tiknar av landsstýrinum.

10. Tað kann verða torført at meta um tíggarligu avleiðingarnar av lógaruppskotinum, serliga hvat møguligum inntøkum viðvíkir, tí hetta veldst í stóran mun um treytirnar, ið ásettar verða í komandi leitingarloyvum, og um hvussu leitingin hepnast.

Forkanningarnar hava givið nakað av inntøkum til landskassan. Mett virði at søla av seismiskum upplýsingum, loyvisgjøld o.l. vildu geva landskassanum inntøkur á 8,0 mió. kr. tilsamans í 1996 og 1997. Verulig inntøkurnar fyri hæði árini vísa seg at verða umaftfyri 11 mió. kr.

Um útreiðslurnar kann verða upplýst, at játtanirnar til Oljufyrisitingina og Jarðfrøðisavnið hava verið vaksandi, síðan forkanningarlógin varð samtykt í 1993. Vøksturin stavar lutvíst frá fyrireikingararbeiðunum hjá Oljuráðleggingarnevndini fram móti einum fyrsta útbjóðingarumfari, lutvíst frá øktum sambandi við útlendsk olju- og kanningarfeløg.

Sambært tíggjarlógaruppskotinum fyri 1998 verða útreiðslurnar hjá Oljumáladeildini *(rakstrarjáttan 2.32.1.01)* 10,3 mió. kr. Nettoútreiðshjáttanin er 8,8 mió. kr., meðan tað verður mett, at inntøkurnar frá t.d. umsóknargjøldum kunna gerast 1,5 mió. kr. Inntøkurnar eru kortini treytaðar av, at umsóknargjøld í sambandi við 1. útbjóðingarumfar falla til gjaldingar í 1998.

Av samlaðu útreiðslunum hjá Jarðfrøðisavninum *(rakstrarjáttan 4.2-4.3.13 undirkonto 21)* á 5,31 mió. kr. fyri 1998 eru 3,6 mió. kr. mettar av hava samband við arbeiðið, ið Jarðfrøðisavnið ger í samstarvi við ella fyri Oljumáladeildina (OFS). Sostatt kann roknast við, at samlaðu útreiðsturnar til oljuumsiting fyri 1998 verða 13,9 mió. kr. Víst verður tit tíggjarlógaruppskotið fyri 1998, tá talan er um ætlaðar játtanir fyri árini 1999 - 2001.

Nakað av serligum útreiðslum er knýtt til eitt útbjóðingarumfar. T.d. verður tað væntandi neyðugt hjá Oljumáladeildini og Jarðfrøðisavninum at keypa væl av jarðfrøðiligari hjálp í sambandi við viðgerðina av umsóknum í 1. útbjóðingarumfari. Aftrat hesum koma útreiðslur til aðra konsulenthjálp, marknaðarføring o.l. Av tí at tað er torført frammanundan at meta um játtanartørvin til slíkar útreiðslur, er ætlanin seinni at biðja um eina eykajáttan í sambandi við 1. útbjóðingarumfar. Oljumáladeildini hevur leysliga mett, at talan kann gerast um einar 2 mió. kr.

VIÐMERKINGAR TIL EINSTØKU LÓGARGREINIRNAR

§ 1. Lógin er galdandi fyri forkanningar o.a.m., leiting eftir, framleiðslu og flutning av kolvetnum gjøgnum rørleiðing á føroyskum land-, sjó- og landgrunnsøki. Lógin er eisini galdandi fyri havstoðir, smb.§ 2, litra b. *Stk. 2.* Lógin miðar móti varisligari og skynsamari leiting eftir og gagnnýting av kolvetnistilfeingjunum til gagns fyri føroyskan búskap og arbeiðsvinnu í Føroyum. Virksemið skal verða soleiðis skipað, at neyðug fyrivarni eru tikin fyri fiskiskapi, sigling, umhvørvis- og náttúruáhugamálum umfram øðrum samfelagsligum áhugamálum.

Viðmerkingar

Í **§ 1, stk 1** verður sagt, hvat lógin er um og hvar hon hevur gildi. **§ 1, stk. 2** lýsir endamálið við lógini.

Lógin er ætlað at galda fyri øll skeið í eini oljuverkætlan, t. e. *forkanningar, leiting og meting, bygging og framleiðsla* umframt *avrigging*. Eisini er lógin galdandi fyri *flutning gjøgnum rørleiðingar* og á *havsvøðum*, smb. viðmerkingarnar til §§ 18 og 19 og § 2, lítra b).

Tørvurin á *forkanningum* er serliga stórur á økjum sum teimum føroysku, sum jarðfrøðiliga eru lítið kannað. Við innleiðandi kanningum verður vanliga roynt, eitt nú við seismikki, at fáa betur skil á størri pørtum av jarðfrøðini.

Seinastu árini eru kanningar gjørdar á føroyska økinum sambært løgtingslóg nr. 179 frá 21. oktober 1993 um forkanningar o.a.m. av undirgrund Føroya, og hevur hetta økt kunnleikan um jarðfrøðiligu viðurskiftini. Forkanningarlógin varð bert ætlað at vera í gildi, meðan arbeitt varð við einari heildarlóggávu um kolvetnisvirksemi. Skotið verður til upp, at ásetingarnar í forkanningarlógini verða fluttar yvir í kolvetnislógina, smb. serliga §§ 4 og 5, og at forkanningarlógin verður sett úr gildi, smb. § 45, stk. 2. Broytingar í rættarstøðuni forkanningum viðvíkjandi eru ikki skotnar upp.

Í *leitingarskeiðinum* verður kannað, um olja og/ella gass er til, og um kolvetni er til í so stór nøgdum, at talan er um rakstrarverdar fundir. Í hesum skeiði er vanligt at gera neyvari seismiskar kanningar o.a. og nakrar djupdarboringar. Leitingarskeiðið varir ofta í 5 - 10 ár og á jarðfrøðiliga minni kendum økjum kanska upp aftur longur.

Verða kolvetni funnin í stórum nøgdum at framleiðsla fæst burturúr, verður næsta skeið *bygg- og framleiðsluskeiðið*. Í hesum skeiði verður ætlað um, hvussu leiðin skal troytast, hvussu framleiðsluøkindin skal verða bygd og hvar, hvussu og nær oljan ella gassið skulu verða tikin í land. Eisini verður gjørt av, nær fatast skal undir framleiðslu.

Tá ið framleitt er í nøkur ár, fara útreiðslur at reka og røkja leiðina upp um nettointøkurnar av leiðini, og tí steðgar framleiðslan. Tá tekur spurningurin um avrigging seg upp, herundir hvat gerast skal við framleiðslutólini. Hesin spurningur verður í lógini viðgjørdur saman við spurninginum um framleiðslu, og lógaruppskotið vísir í §§ 20 og 21 á møguligt at brúka, tá riggað verður av.

Stk. 1 staðfestir eisini, at lógin landafrøðiliga er galdandi á føroyskum land-, sjó- og landgrunnsøki. Føroyska sjóøkið er býtt í ein ytra og ein innara part, smb. § 1, stk. 1 í fyriskipan nr. 599 frá 21 desembar 1976. Ytri parturin er 3 fjórðingar úr beinum grundlinjum, meðan innari parturin er sjógvurin innanfyri nevndu grundlinjur, eitt nú havnir, innsiglingar, pollar, vágir, víkir, firðir og sund.

Yvirvaldsrættur danska ríkisins yvir landgrunninum út fyri ríkisins strondum varð lýstur við kongaligari fyriskipan nr. 259 tann 7. juni 1963. Lýsingin fevnir eisini um føroyska landgrunnin. Sambært altjóða rætti er lýsingin grundað á landgrunnssáttmálan frá 29. apríl 1958. Eftir hesum sáttmála kann yvirvaldsrættur strandalandsins yvir landgrunninum røkka, annaðhvørt til 200 metra djupdarlinjuna, ella so langt út, sum tøknin loyvir gagnnýting.

Fursætisráðið hevur við fráboðan í Statstidende tann 7. mai 1985 fyribils ásett víddina á føroyska landgrunninum. Landnýtingsparturin svarar til 200 fjórðinga fiskiøkið, men heldur seg nakað innan fyri fiskimarkið, m.a. har fiskimarkið umskartar bretska fiskimarkið og íslendska húskarlaøkið. Útsynningsparturin svarar til tann partin av Føroya-Rockall ryggjunum, sum Danmark vegna Føroyar roknar sum náttúrligt framhald av føroyska landgrunninum, men við virðing fyri 200 fjórðingu markinum hjá grannalondunum. Móti Bretlandi er 200 fjórðinga markið roknað úr Sankt Kilda og ikki úr Rockall. Út ímóti havdýpinum er markið sett varisliga, samanborið við reglurnar í grein 76 í havrættarsáttmálanum. Endalig áseting kann ikki væntast, fyrr enn landgrunnsmørkini ímóti Íslandi, Bretlandi og á Rockall ryggjunum møguliga móti Írlandi eru ásett, annaðhvørt við samráðingum ella dómi.

Landgrunnsmarkið millum Føroya og Noreg er sett í sáttmála millum Danmarkar og Noregs frá 15. juni 1979.

Avtalaða markið er miðlinja, sum eisini er fiskimark. Fyribils er mark hert sett út á tað punktið, ið liggur 200 fjórðingar frá londunum.

Sambært **stk. 2, 1. pkt.** er endamálið við kolvetnislógini ein varislig og skynsamilig gagnnýting av kolvetnistilfeinginum til gagns fyri føroyskan búskap og arbeiðsvinnu í Føroyum.

Endamálsorðingin, sum vendir sær bæði til myndugleikar og loyvishava, leggur við orðunum *varisliga og skynsamiliga* áherðslu á tilfeingisfyrilit, t. e. at í framleiðsluni skal dentur leggjast á skynsamiliga og forsvarligan gagnnýting, bæði privat- og samfelagsbúskaparliga, soleiðis at sum mest læst burturúr hvørjum einstøkum kolvetnisfundi. Hetta krevur m.a. neyvan kunnleika til goymslujarðfrøði og -tøkni. Ógvuliga ymiskt er, hvussu poknurar oljuleiðir eru, og hvussu trýstið er. Hvussu nógv fæst burtur úr eini goymslu veldst nógv um valda arbeiðslagið.

Tað verður hildið skynsamt, at loyvishavi, longu tá ið byrjað verður, er bundin av fyriliti um at umsita tilfeingið á hvørjari einstakari leið forsvarliga. Á tann hátt styttist millum endamálini, myndugleikar og loyvishavar hava við virkseminum. Hetta skuldi eisini lætt um, tá ið framleiðslugongd verður løgd til rættis, smb. § 14, stk. 2. Tað liggur á myndugleikunum at taka avgerð um, hvussu kolvetnistilfeingið sum heild eigur at verða troytt, tá ið útbjóðingarumfør verða sett í verk, leiðbyggiætlanir og rørleiðingar verða góðkendar og í teimum serligu førunum, tá framleiðslan verður tillagað, smb. § 14, stk. 5.

Í endamálsgreinini er eisini dentur lagdur á, at kolvetnistilfeingið skal verða brúkt til gagns fyri *búskap og arbeiðsvinnu*. Hetta samsvarar við avgerð løgtingsins frá 24. sept. 1993 (løgtingsmál 5/1993), sum leggur serligan dent á at stimbra vinnupolitikkin.

Í møguligum byggi- og framleiðsluskeiði kann føroyski parturin, hóast hann er lítil í mun til samlaðu arbeiðsmegina og veitingarmar, hava lutfalsliga stóra ávirkan á føroyskt vinnulív og føroyskan samfelagsbúskap.

Oljufeløgini fara í ávísan mun sjálvi at duga at siggja fyrimunirnar við at spyrja eftir vøru, tænastu og arbeiðsmegi í Føroyum, men í øðrum førum er hugsandi, at tey bara gera tað, um myndugleikarnir krevja tað, sum treyt fyri at feløgini sleppa at virka í Føroyum. § 10 heimilar slíkum treytum. Treytirnar mugu lagast eftir, hvørjar møguleikar føroyingar hava at bjóða tær tænastur feløgunum tørvar, tí tørvi, føroyska samfelagið hevur, og eftir krøvum, sum altjóða kappingin í kolvetnisvinnuni setur.

Royndir frá øðrum samfeløgum, sum hava verið fyri oljuídnaðarmenning, eru, at samfelagsbúskapurin kann verða ávirkaður ógvisliga, bæði beinleiðis ígjøgnum vinnulívið og óbeinleiðis ígjøgnum almennar inntøkur, sum kunnu føra til vøkstur í almennu útreiðslunum. Hetta kann hava ringa ávirkan á kappingarevnini hjá vinnulívinum annars. Týdningarmesti setningurin hjá føroyskum myndugleikum í hesum viðfangi verður, einamest ígjøgnum búskaparpolitikk, at stýra *ávirkanini* frá oljuvirkseminum á samfelagið og samfelagsbúskapin. Miðað eigur at verða móti, at fáa eitt vinnulív, sum stendur seg í altjóða kapping tann dagin, tá oljuídnaðurin fer at nærkast endanum.

Umframt hetta nevnir stk. 2. 2. pkt nøkur viðurskifti, sum bæði myndugleikar og loyvishavar skula ansa eftir, tá virksemið verður lagt til rættis.

Fyrilit skal verða havt við fiskiskapi, t.d. skulu kanningarskip ansa eftir fiskiskapi og aðrari sigling. Tá ið boriloyvi verða givin eftir § 14, stk. 1 kunnu avmarkingar verða gjørdar, t.d. í sambandi við fiskitíð og aðrar serligar treytir um fiskiskap.

Umhvørvis- og náttúrutáhugamál eiga at verða vird. Hetta krav er galdandi við síðuna av reglunum um frágreiðingar og umhvørvisligar metingar, smb. § 7, stk. 2 og § 22. Afturat kemur skylda loyvishavans í leit-

ingar- og framleiðsluskeiðinum at arbeiða forsvarliga, tá tað ræður um umhvørvið, smb. § 13. Harumframt fara umhvørvisatlit, m.a. reglur um at lata evni út í sjógv, at verða umsitin eftir heimildum í havumhvørvislógini (kongalig fyriskipan nr. 318 frá 26. juni 1985). Millum náttúrumálini kann t. d. verða nevnd ávirkanin, ið virksemið hevur á sjófuglar.

Samfelagslig áhugamál eru tikin við bæði í endamálsgreinini og § 7, stk. 2 um frágreiðing landsstýrisins til løgtingið, áðrenn nýggj lóki verða boðin út. Hildið verður, at tørvur er á at lýsa ávirkanina, sum oljuvirksemi fer at hava á samfelagið, og at siggja til at leggja virksemið soleiðis til rættis, at sleppast kann undan skaðiligari ávirkan.

§ 2. Í hesi lóg skilst við:

a) Kolvetni: jarðolja, dropagass, jarðgass og onnur kolvetnoi, sum náttúrliga eru í undirgrundini, og sum kunnu framleiðast flótandi ella í luftlíki.

b) Havstøðir:
   (i) Fastur útbúnaður sum pallar, rørleiðingar og onnur virki og innretningar á sjóøkinum og landgrunninum, ið verða nýtt til virksemi, nevnt í § 1.
   (ii) Flytandi eindir sum boriskip, -ræðgi, framleiðslu-, goymslu-, íbúðar- og lík før, meðan tey eru støðuføst og verða nýtt til virksemi, nevnt í § 1.

Viðmerkingar

Ásetingin í **§ 2, litra a)** skilmarkar tey kolvetni, ið lógin fevnir um.

Í § 2, litra b) verður heitið havstøð nýtt sum felagsheiti bæði fyri fastum útbúnaði, sum nýtur verður á sjóøkinum og landgrunninum, og flýtandi eindum, meðan tær eru støðufastar, og verða nýttar til kolvetnisvirksemi á sjóøki og landgrunni.

Endamálið við hesum er at tryggja, at almenna eftirlitið við trygdar-, heilsu- og umhvørvisviðurskiftum í frálandsvinnu, smb. eisini §§ 23 — 27 við viðmerkingum, verður munadygt. Hildið verður, at tann útbúnaður, ið § 2, litra b) fevnir um, sama hvørjum slagi hann er av, hevur við sær eins stórar vanda, og at tørvurin á nágreiniligum trygdarreglum, -eftirliti og -samskipan er stórur í frálandsvinnuni. Tí verður hildið skilagott at mæla til, at høvuðspartarnir í kolvetnisvinnuni, hvat viðvíkir trygd, heilsu og arbeiðsumhvørvi eru undir somu lóggávu. Við trygdini fyri øllum virkseminum í hyggju, hevur tað havt við sær, at hildið verður neyðugt at lata hugtakið havstøð eisini fevna um annan útbúnað enn hann, ið er í beinleiðis sambandi við havbotnin. Av praktiskum grundum eru reglurnar í kap. 5 í lógini ætlaðar at galda, bæði tá ið havstøðin er fingin endaliga uppá pláss, men ikki enn tikin í brúk, og í tíðarskeiðnum til støðin er farin av plássinum, avriggað ella brúkt til annað endamál.

Flytandi eindirnar, nevndar eru í § 2, litra b), (ii), eru sum nevnt undir lógini, tá ið tær eru støðufastar og verða nýttar til tað í § 1 nevnda virksemið. Útbúnaður, sum verður sigldur ella sleipaður, er ikki undir lógini. Eftir hesum koma til dømis boriskip, framleiðsluskip, goymsluføtur, íbúðarfør, umframt fermingar- og lossingarútbúnaður o.a. undir skilmarkingina, meðan tey eru í kolvetnisvirksemi. Hinaftanfyri kunna hjálpar-, vaktar- og útgerðarskip, avleggingarføtur, seismografisk skip og tangaskip ikki undir skilmarkingina, av tí at hesi skip hava ikki fast og støðugt tilknýti til virksemið. Alburat hesum kemur, at hesi skip og før eru undir aðrari og viðvíkjandi trygd nøktandi lóg, t.e. lóg nr. 98 frá 12. mars 1980 um skipatrygd við seinni broytingum. Viðvíkjandi trygd eru boriskip undir sjóferðslulóggávu, men hildið verður neyðugt, at hesi skip, tá ið tey bora, verða mett sum havstøðir, av tí at hetta gevur landsstýrinum høvi at áseta allar neyðugar trygdarfyriskipanir. Harumframtan hevði tað verið skilagott, smb. tí, ið nevnt er omanfyri um tørv á trygdarsamskipan og aðrari samskipan, at allar tær heimildir, neyðugar eru til eftirlitið, verða givnar landsstýrinum.

Skilmarkingin av flytandi eindum, skipum og førum hevur haraftrat við sær, at tá ið tey eru undir kolvetnislógini, kunnu tey ikki avmarka sína ábyrgd samsvarandi reglunum í sjólógini, smb. § 41 við viðmerkingum.

Landafrøðiliga er lógin avmarkað til havstøðir, sum eru á ytra ella innara sjóøkinum, smb. viðmerkingarnar til § 1, og føroyska landgrunnin. Á sjóøkinum hava Føroyar/Danmark eftir altjóða rætti fullan yvirvaldsrætt, smb. myndugleikabýtið í heimastýrislógini. Á landgrunninum er yvirvaldsrætturin avmarkaður til leiting og gagnnýting av náttúrutilfeingjunum á grunninum. Ósemja er um, hvussu langt heimildin sambært altjóða rætti til leitingar og gagnnýting av náttúrurikidømunum rekkur, men sambært norskari og danskari venju verður hildið, at landgrunnssáttmálin frá 1958, sum Danmark staðfesti í mai 1963, gevur strandalandinum løgdømi yvir øllum virksemi í sambandi við leiting og framleiðslu av m.a. kolvetnum á og í landgrunninum. Tað er sostatt samsvarandi altjóða rætti, at føroyingar seta í gildi rættarreglur fyri havstøðir við omanfyri nevndu endamálum. Somuleiðis kunnu føroyskir myndugleikar áseta og handhevja reglur um tvingsil móti teimum, sum við ongum rætti leita ella framleiða á landgrunninum, ella sum í virksemi sínum bróta galdandi reglur ella ásettar treytir.

Lógin er galdandi fyri bæði føroyskar og útlendskar havstøðir í virksemi á sjóøkinum og landgrunninum. Hetta er neyðugt til tess at skipa alt leitingar- og framleiðsluvirksemið á økinum, m.a. av trygdarávum.

§ 3. Kolvetni, nevnd eru í § 1, hoyra Føroyum til. Forkanning, leiting ella framleiðsla kann einans setast í verk av øðrum við loyvi, fingnum sambært reglunum í hesi lóg.
Stk. 2. Føroyskur rættur annars er galdandi fyri havstøðir á landgrunninum og trygdarøki rundanum, er ikki annað ásett í aðrari lóggávu ella í reglum ásettum av landsstýrinum.

Viðmerkingar
Stk. 1 ásetir, at kolvetni eru ogn Føroya lands. Á landgrunninum merkir hetta sambært altjóða rætti, at Føroyar hava einarætt at leita eftir og gagnnýta ráevni, herundir kolvetni.

Kolvetni er eitt av teimum ráevnum, sum sambært lóg nr. 181 frá 8. mai 1950 um leiting eftir og útvinning av ráevnum í undirgrund Danmarkar kongaríkis er undir ognarrætti ríkisins, tí tey ikki fyrr enn 23. februar í 1932 hava verið gagnnýtt av privatum.

Heimastýrið hevur sambært avtalu 22. desember 1992 millum donsku stjórnina og Føroya landsstýri yvirtikið málsøkið "ráevni í undirgrundini", t.e. tey ráevni, sum eru undir áðurnevndu undirgrundarlóg frá 8. mai 1950. Avtalan varð, eftir at løgtingið hevði góðkent hana, lýst í Kunngerðarblaðnum sum kunngerð nr. 96 frá 13. mai 1993. Sum skilst av hesum kann uttan iva verða staðfest, at kolvetni eru ogn Føroya lands. Privat, eitt nú oljufelog, kunnu bert reka virksemi, nevnt í § 1, við loyvi fingnum sambært lógini. Leitingar- og framleiðsluloyvi sambært koncessión eru at skilja soleiðis, at framleitt kolvetni gerast ogn loyvishavans.

Loyvi sambært hesi lóg, sleppir ikki loyvishavanum undan at søkja um loyvi og góðkenningar, sum verða kravd í aðrari lóggávu.

Við **stk. 2** verður annar føroyskur rættur settur í gildi fyri havstøðir á landgrunninum, smb. § 2 litra b), og í trygdarøkjum uttan um tær, smb. § 27. Ásetingin verður mett at fáa fýlning á tann hátt, at føroyskur privatrættur og reglurnar um, hvørs lands rættur skal nýtast, verða galdandi. Í nøkrum førum má haldast, at serligar almennar reglur fara at verða settar í gildi fyri oljuvirksemið, til dømis heinda lógin og serligar umhvørvisreglur.

Hugtakið *føroyskur rættur* er at skilja sum bæði løgtingslógir, danskar lógir í gildi í Føroyum, kunngerðir o.l. og óskrivaður rættur.

Føroyskur rættur er ikki galdandi á havstøðum og trygdarøkjum, um onnur lóggáva staðfiga sigur annað, eitt nú um lógin beinleiðis ásetir antaað gildisøki ella lógin má tolkast soleiðis, at hon bara er ætlað at galda á føroyskum landøki, eitt nú løgtingslóg um haruveiðu. Somuleiðis galda reglurnar í kolvetnislógini um trygd á havstøðum v.m. §§ 23 — 28 í staðin fyri løgtingslóg um arbeiðaravernd, brunalóg og aðrar lógir um trygd og arbeiðsumhvørvi, samsvarandi reglunum um *lex specialis*.

Tað kann tó eisini koma fyri, at tað fer ikki at vera skilagott at víðka føroyska lóg at galda uttanfyri sjónøkið, sjálvt um lóggávan ikki er til hindur fyri tí. Tað verður tí skotið upp, at landsstýrið fær útsítingarliga heimild til at áseta, at úvísir partar av føroyskari lóg ikki skula verða galdandi á havstøðum á landgrunninum og í trygdarøkinum rundanum tær.

Sum dømi um føri, har tað kann vera skilagott at áseta, at føroyskur rættur sum heild ikki skal vera galdandi á havstøðum, eru rørleiðingar til millumlandaflutning, smb. § 19, háast tær í mynd í vetni eru havstøðir sambært lógini. Eitt annað dømi er útbúnaður til gagnnýting av fundum, sum røkka um mark til annað land. Í tílíkum førum verður ofta gjørd avtala við grannalandið um samtrúyting og tá er ofta skilagott, at ein havstøð er undir sama løgdømi, uttan mun til hvørjumegin landgrunnsmarkið hon liggur.

Serliga tá ræður um virksemi í trygdarøkinum kunna grundir vera til varsemi við at seta føroyska lóg í gildi. Strandalandið verður ikki hildið at hava eins víðar heimildir í trygdarøkinum sum á havstøðunum sjálvum, av tí at altjóða rættur bert loyvir strandalandinum at seta í gildi tiltøk, sum er treyðug at verja viðkomandi havstøð, smb. § 5(2) í landgrunnssáttmálanum. § 27 um trygdarøki leggur tí dent á vernd av útbúnaðinum, smb. eitt nú rættin at bannað óviðkomandi skipum at koma inn á øki. Stríð millum løgdømi flaglandsins og strandalandsins kann serliga hugsast, tá talan er um skip ella útbúnað skrásett í útlandinum, ið táa loyvi at koma inn á trygdarøkini at arbeiða. Hesi skip o.l. – við manningum – mugu sjálvandi lýða reglur strandalandsins um sigling, ankring og arbeiði á økinum v.m. Men tá talan er um aðra føroyska lóg enn hana, ið beinleiðis viðvíkir vernd av (øðrum) havstøðum, kunnu góðar grundir vera at vísa varsemi. Í tílíkum førum eigur dentur at verða lagdur á, hvat tilknýti viðkomandi frammanda skip o.l. hevur til havstøðirnar og virksemið á teimum. Eitt frammant skip á trygdarøkinum kann samanetast við eitt útlendst skip á innara sjónøkinum, eitt nú í føroyskari havn: Føroyar hava sambært vanligum altjóða rætt løgdømi, men í verki verður tílíkt løgdømi ikki útint, tá tað ræður um "innanhýsis ósemjur" umborð. Á trygdarøkjunum kann sostatt metast til, at føroysk lóg – serstakliga er hon í stríð við reglurnar í flagglandinum – bert verður handhevja mótvegis útlendskum skipum v.m. er talan um verndarreglur samsvarandi endamálinum við trygdarøkinum ella um skipið ella útbúnaðurin er í trygdarøkinum í longri tíð og hevur tætt tilknýti til virksemið í økinum.

§ 4. Landsstýrið kann veita loyvi til forkanningar við atliti at leiting eftir og framleiðslu av kolvetnum í undirgrundini og til vísindaligar kanningar av undirgrundini, sum hava týdning fyri hetta virksemið.
Stk. 2. Verður ikki stuttri tíðarfreist ásett í einum loyvi, er tað galdandi í 3 ár. Í loyvinum skal verða tilskilað, hvørji øki, tað fevnir um.
Stk. 3. Loyvi til forkanningar gevur rættindi til jarðfrøðiligar, jarðalisfrøðiligar, jarðevnafrøðiligar og jarðtøkniligar kanningar. Loyvið gevur ikki rætt at bora eftir ella at framleiða kolvetni, heldur ikki forrætt til seinni leitingar- og framleiðsluloyvi.

Viðmerkingar
Endamálið við reglunum í **stk. 1 fyrsta parti** (forkanningar) er at skapa møguleikar hjá áhugaðum fyritøkum at fara undir fyribils kanningar av, um grundarlag er fyri miðvísari ráevnisleiting. Endamálið við forkanningararbeiðnum er sostatt at kortleggja eitt ávíst øki sum grundarlag undir eini fyribils meting av, um útvinnandi ráevni kunna verða í økinum.

Forkanningar fevna um kanningararbeiði sum t.d. jarðalisfrøðiligar kanningar, herundir seismiskar mátingar, og jarðevnafrøðiligar kanningar. Loyvi tit forkanningar fevna vanliga eisini um sonevndar grunnar boringar, t.e. boringar fáar [00] metrar niður, men eftir umstøðunum kunnu eisini djúpari boringar verða gjørdar.

Reglurnar í **stk. 1 øðrum parti** *(vísindaligar kanningar)* hava til endamáls at tryggja innlit í vísindaligar kanningar av undirgrund Føroya, sum kunnu hava týdning fyri leiting eftir og útvinning av ráevnum í undirgrundini. Tílíkar kanningar kunnu vera munagott fkast til jarðfrøðiliga kortlegging av týdningi fyri útvinning. Við vísindaligar kanningar skiljast kanningar á staðnum og mátingar, ið krevja tøkniliga útgerð, t.d. tyngdarkanningar-, sigulmagns- ella seismiskar kanningar, radiometriskar mátingar, mátingar av hitastreym-

um o.a.m. umfram boringar. Vísindaligar kanningar, ið hava til endamáls at kortleggja onnur náevni enn kolvetni, og kanningar, ið byggja á eldri mannagongdir, eitt nú innsavning av staklutum, ið liggja omaná landinum, og ikki eru liður í oljuleiting, gilda reglurnar ikki fyri.

Reglurnar í stk. 1 um at vísindaligar kanningar krevja loyvi, hava harafturat til endamáls at tryggja, at vísindaligar kanningar, herundir serstakligu møguligar boringar, verða gjordar á trygdarliga forsvarligan hátt. Endamálið er eisini at forða fyri brotum móti reglunum og mannagongdunum í loyvisloggávuni gjøgnum vísindaligar kanningar, sum eisini hava vinnuligt virði.

Sambært § 4, stk. 1 er tað landsstýrið, ið gevur loyvi til forkanningar og vísindaligar kanningar. Landsstýrið ásetir eisini gjøllari reglur fyri tílíkum loyvum, smb. viðmerkingarnar til § 5, stk. 1 og galdandi forkanningarlóg § 2. Í verki hevur landsstýrið latið Oljufyrisitingini heimildir sínar, smb. kunngerð nr. 10 frá 15 februar 1996. Oljufyrisitingin hevur orðað standarkrov til loyvi til bæði forkanningar og vísindaligar kanningar.

Higartil eru forkanningarloyvi givin sambært forkanningarlógini, logtingslóg nr. 179 frá 21 oktober 1993. Í 1994 og 1995 fekk hvert eitt felag loyvi at skjóta seismikk við tí endamálið at fáa í lag eina víðfevnda kanning av føroyska landgrunninum innan fyri 200 fjórðingar. Nú er mannagongdin tann, at allar umsóknir vanligа verða játtaðar uttan so at nakað talar ímóti í tí einstaka førinum.

Sambært **stk. 2** kunna loyvi verða givin í upp til 3 ár. Hóast ætlaðu kanningarnar kundu verið gjordar eftir stuttri tíð. Føroysku standarloyvini hava higartil ikki verið galdandi í meira enn eitt ár til tess at kunna broyta treytirnar sobvøtt sum royndirnar gjørdust fleiri. Vanligt er í grannalondum okkara, at standarloyvi til forkanningar hava gildi í 2 – 3 ár móti gjaldi av fastari ágáva. Á henda hátt stendist loyvishavunum ógvuliga lítið at leggja kanningarnar til rættis samsvarandi praktiskum og handilsligum áhugamálum. Tað er ein fortreyt, at landsstýrið (Oljufyrisitingin) fær boð frammanundan, hvørjaferð kanningar verða settar í verk. Loyvi til vísindaligar kanningar vera vanliga einans givin til nokiligar kanningar.

Tey øki, ið eitt loyvi latar um, eru oftа lýst í víðari orðing, eitt nú sum alt landlokið við innara sjóbotninum ella allur landgrunnurin ella ávísir partar av honum. Serlig fyrivarni verða tikin viðvíkjandi økjum, ið kunna vera partur av møguligum marknasamráðingum við grannalond.

Kanningarnar nevndar í **stk. 3, 1. pkt.** eru eisini nevndar í viðmerkingunum til stk. 1. Beinleiðis kanningar sum djúpar boringar, ið miða ímóti at fáa vitan um, hvørt kolvetni, ið kunnu útvinnast á rakstrarverdan hátt, finnast, koma ikki undir reglurna. Heldur ikki tílík tiltøk, sum hava til endamáls at kortleggja útbreiðslurnar av gjørdum fundum ella fyrireika gagnnýtingina av teimum.

Einkarrættur til útvinning av kolvetnisfundum verður saumbært lógini gevin í leitingar- og framleiðsluloyvi, smb. § 6, stk. 1, sum harafturat gevur rætt til forkanningar í øllum økinum, loyvið er galdandi fyri. Í **stk. 3, 1. pkt** verður sagt, hvørjar kanningar eitt forkanningarloyvi gevur rætt til, og harafturat verður gjørt greitt í **stk. 3, 2. pkt.**, at forkanningarloyvi ikki kunna veita einarætt til boring eftir ella framleiðslu av kolvetnum. Harafturímóti fer væl at bera til at bora eftir einum forkanningarloyvi, serstakligа grunnar ella stratigratiskar borhgar, sum einans hava til endamáls at útvega vitan um undirgrundina. Í seinasta parti av reglini verður skotið upp, at eitt tílíkt loyvi onguntíð kann geva forrætt til seinni leitingar- og framleiðsluloyvi. Grundin er, at verða forrættindi veitt, fer tað at minka um áhugan hjá øðrum oljufelagum at senda umsóknir inn í seinni úthjóðingarumførum. Hetta hevði ávirkað treytirnar, ið landsstýrið hevði kunnað lingið í hesum umførum.

Forkanningarloyvi við fratrúhjáretti eru ikki ókend í økjum, har felagini meta vinningar so lítlar, at tað hevði ikki borið til at fingið sjálvt forkanningarvirksemi í gongd, uttan áhugað felog hevdu lingið forrættindi. Tá forkanningarlógin frá 1993 varð fyrireikað, varð hildið, at oljufelagini hevdu samirkið av áhuga fyri føroyska

økinum, at sond mannagongdir í kanningum kundu verða skotnar upp, sum tær í brúktar verða í Norðsjóvarøkinum. Áhugin hjá oljufeløgunum er framvegis stórur og grundir tykjast ikki vera til at broyta reglurnar.

§ 5. Landsstýrið kann áseta treytir fyri einum forkanningarloyvi ella einum loyvi til vísindaligar kanningar, herundir um rindan av avgjaldi og ágávu og frágreiðing um gongdina í kanningunum og um úrslitini, og um trúnað.
Stk. 2. Landsstýrið kann áseta reglur um avgjøld og ágávu fyri at veita loyvi.

Viðmerkingar
Til tess at tryggja eftirlitið við kanningunum (tíðarskeið, mannagongdir, útgerð og úrslit o.a.) og at útvega tí almenna so góðan kunnleika sum gjørligt til viðurskiftini í undirgrundini, verður í loyvunum sambært **stk. 1** ella í vanligum forskriftum, smb. § 29 gjøllari ásett, hvørjar frágreiðingar skulu verða gjørdar, og á hvønn hátt loyvishavin skal senda myndugleikunum frágreiðingar um virksemi sítt. Eisini verður ásett her, hvørjar stakroyndir, rátilfar, viðgerðarúrslit, tulkingar v.m., skulu latast myndugleikunum, og nær hetta skal verða gjørt. Fyribils er tað bert í standartreytunum hjá Oljufyrisitingini til loyvi til forkanningar og vísindaligar kanningar, at frágreiðingar og innlating av tilfari eru gjøllari viðgjørd, smb. viðmerkingarnar til § 4.

§ 5 í galdandi forkanningarlóg ásetir, at kanningar til havs skulu leggjast til rættis við neyðugum atliti fyri fiskiskapi. Sambært § 45, stk. 2 í hesum lógaruppskotinum verður skotið upp, at forkanningarlógin verður sett úr gildi. Hóast hetta verður rættarstøðan óbroytt, av tí at fyrilit fyri fiskiskapi og sigling er ein partur av endamálsorðingini í hesi lógini, smb. § 1, stk. 2 við viðmerkingum.

Landsstýrið fer framvegis í forkanningarloyvunum at seta treytir um m.a., at kravt kann verða, at seismisk kanningarskip taka fiskikønan eygleiðara við.

Higartil hevur fiskikøni eygleiðarin verið við skipum til kanningar við loyvi sambært forkanningarlógini. Eygleiðarin hevur bert ráðgevandi myndugleika. Høvuðsendamálið er at hava samband við møgulig fiskiskip á kanningarøkinum, soleiðis at tað slepst undan samanstoytum.

Av tí at endamálsreglan í § 1, stk. 2 ikki bert hevur boð til myndugleikarnar, áleggur reglan kanningarfeløgunum eina almenna skyldu til at hava fyrilit fyri fiskiskapi á kanningarøkinum. Verður tað neyðugt at útbyggja hesa skyldu við gjøllari reglum, gerst hetta við almennum forskriftum ella treytum í einstøku loyvunum sambært hesi regluni.

At enda kann verða nevnt, at § 4 í forkanningarlógini um ábyrgd loyvishavans verður sambært lógaruppskotinum sett í § 34 í kolvetnislógini. Hetta ber m.a. í sær, at ábyrgdarreglan er galdandi fyri alt virksemið sambært kolvetnislógini. Um hetta verður víst til § 34 við viðmerkingum.

Endamálið við reglini um trúnað í síðsta petti í hesi grein er at verja innkomið tilfar í eitt ávist tíðarskeið, av tí at tílíkt tilfar bæði kann vera handilsligt loyndarmál og hava virði hjá teimum, ið hava forkanningarloyvi, at bróka til søfu ella umbýti. Tá skeiðið, ið vanliga er 5 ár, er runnið, kann hetta tilfar latast áhugaðum privatum – møguliga fyri gjald – soleiðis sum vanligt er í øðrum londum. Landsstýrið hevur í kunngerð nr. 10 frá 15. februar 1996 ásett, at tilfar, ið latið verður oljufyrisitingini sambært forkanningarlógini, kemur ikki undir lóg um alment innlit, meðan reglurnar um trúnað, sum ásettar eru í loyvinum, eru galdandi.

Ágávir fyri umsitingarútreiðslur og møgulig avgjøld verða ásett soleiðis, at tey ikki fara at minka um áhugan at gera forkanningar á føroyskum øki, av tí at tað almenna hevur sjálvsagdan áhuga í at fáa betri kunnleika til undirgrundina við forkanningum, ið aðrir gera. Í stk. 2 verður skotið upp, at landsstýrið fær heimild at áseta almennar reglur um orðing og støddd av møguligum ágávum og avgjøldum. Áður nevnda kunngerð nr. 10 frá 15. februar 1996 setir umsóknargjaldið til kr. 10.000,00 og árliga loyvisavgjaldið til kr. 75.000,00.

§ 6. Landsstýrið kann veita loyvi við einkarætti til leiting eftir og framleiðslu av kolvetnum á neyvi ásettum økjum við gjøtla ásettum treytum. Loyvi kann bert veitast umsøkjarum, sum ætlandi hava neyðugan sakkunnleika, royndir, førleika og fíggjarorku. Tá avgjørt verður at veita loyvi, skal landsstýrið leggja dent á, í hvønn mun tað almenna fær inntit í og gagn av loyvda virkseminum.
Stk. 2. Í loyvi eftir stk. 1 skulu vera reglur um tey viðurskifti, nevnd eru í §§ 8-12, og harafturat kann landsstýrið áseta treytir, ið hildnar vera neyðugar.

Viðmerkingar
Ásett verður í **stk. 1**, at tað er landsstýrið, ið veitir loyvi við einkarætti til leitingar eftir og framleiðslu av kolvetnum úr undirgrunnini. Sum nevnt í viðmerkingunum til § 3, ber einkarættirin vanliga við sær, at loyvishavin gerst eigari av møguligum kolvetnum framleiddum í loyvisøkinum.

Leitingarvirksemi ber í sær ágreinilagar kanningar, m.a. dypdarboringar á einum øki, har metingar av forkanningarútslitum vísa, at møguleikar eru at finna kolvetni.

Framleiðsluvirksemi fatar um alt tað arbeiðið, ið neyðugt er til framleiðslu av einum gjøntum kolvetnisfundi, smb. viðmerkingarnar til § 1, stk. 1.

Loyvi samsvarað § 6 verða veitt sum felagsloyvi til leitingar og framleiðslu. Grundin er, at fyritøkur neyvan fara at gera fløgur við teimum stóru uppheddum, ið neyðugar eru til djúpar leitiboringar og annur líknandi ovurdýr arbeiði, uttan so at tey frammanundan hava tryggjaðan rætt til framleiðslu og ogn (at selja víðari) av møguligari olju og í ávísan mun kenna treytirnar, ið fara at vera galdandi fyri framleiðsluna.

Í stk. 1 verður harafturat ásett, at loyvi verður givið fyri nærri avmarkað øki, ásett í loyvinum. Tað vanliga er, at alt økið verður býtt í teigar, og at loyvi verður givið til ein ella fleiri teigar (ásett við krosstølum). Harafturat kann loyvisøkið verða avmarkað í dýpd.

Tað stendst av stk. 1, 2. pkt., at tá ið loyvi verður givið, verður dentur lagdur á fíggjarstyrki, førleika, tøkniligu kunnleika og royndir umsøkjarans. Harafturat verður dentur lagdur á, at virksemi umsøkjarans er soleiðis skipað, at tað almenna fær int sítt eftirlit og sína umsjón við virkseminum. Í hesum sambandi ber til at krevja, at loyvishavin stovnar og varðveitir eitt skipað tilknýti til Føroyar, soleiðis at gjørligt verður at handhevja skatta-, avgjalds-, eftirlits- og ábyrgdarreglur mótvegis felagnum.

Stk. 2 ásetir, at loyvini í minsta lagi skulu fevna um tey mál, ið umrødd eru í §§ 8 — 12, t.e. leitingarskeið, treytir fyri at leingja loyvið, arbeiðsskyldur, reglur um at brúka føroyska arbeiðsmegi, tænastuveitingar o. a., reglur um at senda inn upplýsingar, trúnað, og hvørjar skyldur, ið standa við, eftir tað at loyvið er gingið út.

Sum nú er, ber ikki til at spáa um allar tær treytir, sum kunnu verða viðkomandi hjá landsstýrinum at seta í einum loyvi. Tí verður at enda í § 6, stk. 2, sagt, at aðrar treytir, sum landsstýrið heldur verða neyðugar, kunnu verða settar. Til dømis er eitki, ið forðar fyri, at loyvið eisini bevur reglur um granskingar- og ílogumál ella reglur um, hvussu føroyskt oljufelag, t.d. eitt landsoljufelag, kann vera við í virkseminum.

§ 7. Loyvi til leiting eftir og framleiðslu av kolvetnum verður sum meginregla veitt eftir at almenn er lýst eftir umsóknum.
Stk. 2. Áðrenn lýst verður eftir umsóknum, leggur landsstýrið eina frágreiðing fyri løgtingið um, hvørji øki ætlanin er at hjóða út, og um almennu treytirnar ætlanin er at seta. Í frágreiðingini skal meðal annað greinast frá, hvørjar avleiðingar kolvetnisvirksemið kann hava fyri sigling, fiskiskap og aðrar vinnur, náttúru-, umhvørvis-, og onnur samfelagsáhugamál. Eisini verður mett um, hvat ikast virksemið fer at geva búskapi og arbeiðsvinnu.
Stk. 3. Landsstýrið kann lata vera við at geva teimum loyvi, ið sókt hava eftir almenna fýsing.
Stk. 4. Landsstýrið kann áseta krøv um gjald av ágávu fyri viðgerð av umsóknum og veiting av loyvum eftir § 6.

Viðmerkingar

Tað fylgir av **stk. 1,** at vanligga verður lýst almennt eftir umsóknum, tá ætlanin er at veita loyvi til leitingar eftir og framleiðslu av kolvetnum (eitt sonevnt útbjóðingarumfar). Endamálið er at fáa flest møgulig felløg við í leitingar- og framleiðsluvirksemið á føroyska økinum. Tess fleiri felløgini eru, tess størri trygd fæst fyri, at fleiri ymisk kanningarhugskot og -mannagongdir verða royndar. Hetta er avgerandi fortreyt fyri, at til feingið verður kortlagt til fulnar. Útbjóðingarumfør, har felløg verða biðin um at senda inn umsóknir um loyvi til ávís øki, føra til kapping, sum ikki fæst í sama mun, verður boðið út á annan hátt.

Stk. 1 fordar kortini ikki fyri, at landsstýrið, um umstøðurnar tala fyri tí, gevur loyvi uttan at lýst er almennt. Fyri øki, har vánirnar ikki eru góðar, kann verða kunngjørt, at frítt er – kanska í avmarkaða tíð — at søkja um loyvi ("Open door"), soleiðis at loyvi kunnu verða veitt, sohvørt sum søkt verður. Umsøkjarin skal í slíkum førum ikki bíða eftir einum útbjóðingarumfari. Onnur før, har tað kann vera skilagott ikki at skipa fyri útbjóðingarumfari, eru, tá tað vísir seg, at ein fundur, ið loyvi longu er givin til, ella ein møguligur fundur, rókkur inn á øki, har ongi loyvi eru veitt. Í tílíkum førum kann tað vera skilabetrt at nýta ta mannagongd, at tann parturin av fundinum ella fundmøguleikanum, ið fer um mark, verður kannaður saman við tí partinum, ið loyvi er fingið til. Í mongum førum verður tað soleiðis, at handilsligt grundarlag bert er undir felags leiting og gagnnýting av fleiri økjum undir einum. Eisini kann talan verða um, at eitt loyvi, sum ikki leingist meira eftir § 8, verður veitt av nýggjum, tí at tað hevur ikki verið gjørligt at gagnnýta kolvetnini til fulnar.

Í frágreiðingini, ið umrødd er í **stk. 2,** verða grundir givnar fyri, hvørji øki (leigur) ætlanin er at bjóða út, og týdningarmestu standartreytirnar lýstar, sum fara at galda fyri loyvunum, ið ætlanin er at veita, tá avgerð er tikin um, hvørjar umsóknir verða játtaðar. Roknað verður við, at almennar treytir verða gjørdar, sohvørt sum royndirnar verða fleiri og meiri vitan fæst um økini.

Standartreytirnar verða at finna í loyvisfyritreynd, ið fylgir við frágreiðingini. Í loyvisfyritreyndini er eisini tilskilað, hvørjar treytir vanliga ikki verða endaliga ásettar, fyrr enn samráðst er við umsøkjaran. Í hesum samráðingum verður helst størstur dentur lagdur á jarðfrøðiligu viðurskiftini í avvarðandi øki og hvussu tað almenna og umsøkjarin meta hesi viðurskifti.

Harafturat verða í frágreiðingini metingar um avleiðingar av oljuvirksemínum fyri sigling, fiskiskap og aðrar vinnur og fyri náttúru- og umhvørvisáhugamál. Hanumframt verður greitt frá, hvat fkast virksemið kann geva til frama fyri búskap, arbeiðsvinnu og onnur samfelagsáhugamál. Frágreiðingin verður sostatt í høvuðsheitum um tey viðurskifti, nevnd eru í viðmerkingunum til § 1, stk. 2, sum vist verður til.

Grundin til at frágreiðingin "verður løgd fyri" løgtingið, er sum nevnt í punkt 9 c) í almennu viðmerkingunum tann týdningur, tað hevur at tryggja, at landsstýrið í so týðandi málum sum veiting av loyvum til oljuvirksemi tekur avgerðir, ið ein meirluti í løgtinginum kann taka undir við. Tá tað ikki er skotið upp, at løgtingið ella ein løgtingsnevnd skal góðkenna frágreiðingina, er tað fyrst og fremst av tí, at hetta helst hevði verið ímóti ætlanunum við stýrisskipanarlógini § 34, 2. pkt., sum sigur, at ein heimild til landsstýrið til áseting av rættarreglum av almennum slagi ikki kann verða treytað av, at reglurnar, sum ásettar verða, skulu hava góðkenning frá umboðum løgtingsins. Í øðrum lagi hevði tað kunnað verið serstakliga ógagnligt, um landsstýrið hevði verið løgfrøðiliga bundið í samráðingum við umsøkjandi oljufeløg at ganga undir treytir, ið løgtingið hevði sett landsstýrinum fyri at góðkenna frágreiðingina, og sum kanska vóru ógvuliga nágreinaligar.

Í Danmark og Noregi er vanligt, at tílíkar ætlanir um útbjóðingarumfør verða lagdar fyri parlamentini. Í donsku undirgrundarlógini frá 1981 er harafturat ásett, at umhvørvis- og orkumálaráðharrin veitir loyvi til leitingar eftir og útvinning av ráevnum eftir at málið hevur verið lagt fyri orkupolitisku nevnd folkatingsins. Eisini her er talan um at "leggja málið fyri" politiskt, t.v.s. at staðfest verður, at nevndarmeiriluti fer ikki at mótmæla, at loyvi verða veitt sum ætlað. Skotið er ikki upp í lógaruppskotinum, at útslitið av samráðingum við umsøkjararnar á sama hátt verður lagt fyri løgtingið, av tí at hetta verður hildið at vera ímóti grundstøð-

innum undir § 3-4 í stýrisskipanarlógini. Henda regla er tó eftir landsstýrisins fatan neyvan til hindurs fyri, at landsstýrið á hóskandi hátt kunnar løgtingið um málið.

Innihaldið í loyvunum verður, sum omanfyri nevnt, ikki endaliga ordað fyrr enn samráðingar hava verið millum landsstýrið og umsøkjararnar um ymisk viðurskifti, herundir serstakliga um uppskot umsøkjaranna til arbeiðsskráir og brúk av føroyskari arbeiðsmegi v.m. Sum heild eigur kortini at verða víst varsemi við at samráðast um ov stórar partar av innihaldinum í loyvunum, tí hetta ventandi fer at leingja um málsviðgerðina og gera hana torførari.

Í **stk. 3** verður staðfest, at landsstýrið verður ikki bundið at veita loyvi, sjálvt um lýst hevur verið alment eftir umsóknum.

Stk. 4 heimilar landsstýrinum, eitt nú í útbjóðingartilfarinum at krevja ágávu fyri at viðgera umsóknir og veita loyvi eftir § 6. Samsvarandi ágávu verður kravd fyri at viðgera umsóknir og geva loyvi sambært forkanningarlógini, smb. viðmerkingarnar til § 5.

§ 8. Loyvi eftir § 6 til leiting verður veitt fyri tíðarskeið, ikki longri enn 12 ár, ið kunnu verða longd við upp til 2 ár í senn, leitingarskeiðið alt kann tó ikki fara upp um 16 ár.
Stk. 2. Hevur loyvishavi lokið tær í loyvinum ásettu treytirnar fyri leinging av loyvinum, hevur hann krav um at loyvið verður longt við atliti at framleiðslu fyri eitt skeið, ið ásett verður í loyvinum, og sum ikki kann fara upp um 30 ár. Leingingin av loyvinum skal í minsta lagi galda fyri teir partar av økinum, ið fata um rakstrarverdar fundir, ið loyvishavi ætlar at framleiða. Landsstýrið kann sum treyt fyri at leingja loyvið krevja, at umsókn um góðkenning av leiðbyggiætlan sambært § 14, stk. 2 verður innsend innan nærri ásetta tíðarliga freist.

Viðmerkingar
Loyvi eftir § 6 gevur einkarrætt til *leiting eftir og framleiðslu av* kolvetni á viðkomandi øki. Í viðmerkingunum til § 6 verð fört fram, at felagsloyvini til leitingar og framleiðslu eru neyðug fyri at fáa feløgini at brúka so stórar upphæddir, sum neyðugar eru til kolvetnisleiting. Talan er kortini ikki um óskerdan framleiðsluratt, men um rætt, sum er treytaður av, at olja ella gass verður funnið í leitingarskeiðinum. Loyvið er við øðrum orðum tvíliðað, har annað liðið bert gerst veruleiki, um nakað verður funnið í fyrra umfari.

Loyvi til leiting kann sambært stk. 1 veitast fyri eitt tíðarskeið upp til 12 ár við møguleika til leinging við í mesta lagi tveimum árum í senn, tó soleiðis, at alt skeiðið fer ikki upp um 16 ár.

Neyvan verður tað vanligt, at byrjanarskeiðið verður 12 ár, men tørvur á longum leitingarskeiðum kann vera stórur í øki sum tí føroyska, sum í oljuvinnusamanhangi er nýtt, og har tvídømi veðurlags-, havfrøðiligar og jarðfrøðiligar umstøður valda.

Leinging av loyvi eftir stk. 1 kemur neyvan uppá tal, gera serlig viðurskifti seg ikki galdandi, eitt nú kunna nóg góðar grundir verða givnar fyri, at tað ikki hevur verið gjørligt í tí upprunaliga tíðarskeiðinum at fáa greiðu á, um funnið kolvetni er rakstrarvert. Í loyvinum verða vanliga reglur um, hvørjar arbeiðsskyldur (arbeiðsskrá) loyvishavin skal lúka í loyvisskeiðinum, smh. viðmerkingarnar til § 9. Sum treyt fyri leinging av skeiðinum kann verða kravt, at arbeiðsskráin verður økt. Eitt loyvi kann eisini verða longt fyri ein part av upprunaliga tilsetaða økinum.

Stk. 2 tryggjar loyvishavanum, um hinar treytirnar í loyvinum er loknar, rætt til at fáa loyvið longt. Tílík leinging skal í minsta lagi galda fyri tey økir, har rakstrarverdir kolvetnisfundir eru gjørdir. Leingingin kann, sum í grannalondum okkara, eisini vera galdandi fyri størri økir, alt eftir hvat veitta loyvið sigur um hetta. Framleiðsluskeiðið kann tó ikki vera longri enn 30 ár.

Nærri reglur verða í loyvinum um, hvørjar treytir skulu vera loknar og hvør mannagongdin skal verða, skal loyvið kunna verða longt. Eitt nú kunnu vera treytir um tøkniligar og figgjarligar upplýsingar, ið loyvishavin skal leggja fram samsvarandi við váttanini um, at fundurin er rakstrarverdur og at loyvishavin ætlar at gagnnýta hann.

Ætlanin við regluni í seinasta punktum í stk. 2, er at forða fyri, at fundir, ið eru staðfestir at vera rakstrarverdir, liggja ónýttir. Vfddargjaldið kann eisini medvirka til hetta, smb. viðmerkingarnar til § 9.

§ 9. Ásett verður í loyvi eftir § 6 hvørjar arbeiðsskyldur loyvishavin skal hika í leitingarskeiðinum sambært § 8, stk. 1 og hvørji avgjøld loyvishavin skal rinda tí almenna. Eitt nú kann ásetast, at rindast skal remmandi avgjald, roknað eftir víddini av loyvisøkinum (víddargjald) og avgjald roknað eftir nøgd ella virði av framleiddum kolvetnum (framleiðslugjald).

Viðmerkingar
Endamálið við at § 6 ásetir, hvørjar arbeiðsskyldur loyvishavin hevur í leitingarskeiðnum, er at tryggja, at mesta orka verður løgd í leitingararbeiðið. Vanliga eru arbeiðsskyldurnar at finna í arbeiðsskránni í loyvinum.

Skyldan kann verða útgreinað, annaðhvørt sum gjøllari ásett arbeiðsmongd ella sum minstauppbæddi, ið brúkast skal til leitingararbeiði á loyvisøkinum. Vanliga fer arbeiðsskráin eisini at hava reglur um tíðaratlan fyri arbeiði og peninganýtslu í leitingarskeiðnum.

Í arbeiðsskránni verða vanliga álagdar loyvishavanum skyldur at gera ávíst kilometratal av seismiskum kanningum og ávíst tal av leitingarboringum gjøgnum ávís jarðløg. Í arbeiðsskránni kunnu eisini vera reglur um, hvørjar fskoytiskanningar skulu gerast av gjørdum fundum við tí í hyggju at gera av, um fundirnir eru rakstrarverdir. Eftirlitið kann krevja fleiri kanningar at greina hesi viðurskifti. Krøvini til arbeiðsskránna verða vanliga lagað eftir teimum vónum, ið eru til eitt øki, áðrenn loyvið verður givið. T.d. kann verða kravt í arbeiðsskrá fyri eitt heldur høgt mett øki, at loyvishavin samstundis átekur sær leitingarskyldur á økjum í lægri meti, sum loyvi samstundis verða givin til.

Umframt at fremja arbeiðsskránna skal loyvishavin, verður hetta tilskilað í loyvunum, rinda landinum avgjøld.

Neyvan fer at bera til at hava avgjøldini óbroytt til tíð og stað. Ætlandi verða tey ásett í sambandi við hvørt útbjóðingarumfarið sær samsvarandi vónunum til tey øki, ið boðin verða út, marknaðarviðurskifti v.m.

Víddargjaldið er remmandi gjald, ið roknað verður eftir víddini av økinum, loyvið er galdandi fyri, vanliga soleiðis at goldið verður fastur prísur fyri hvønn ferkilometur. Gjaldið kann vera óbroytt alt loyvisskeiðið, men tað kann eisini vera soleiðis, at tað er óbroytt upprunaliga loyvisskeiðið og hækkar, verður loyvið longt, smb. § 8, stk. 1. Verður skeiðið longt við framleiðslu fyri eyga, smb. § 8, stk. 2, kann víddargjaldið møguliga hækka enn meira. Tílík hækkandi víddargjøld kunnu medvirka til, at loyvishavin bert søkir um leinging av leitingarskeiðinum fyri tey øki, hann ætlar at kanna, og at fundir, ið eru staðfestir at vera rakstrarverdir, ikki verða liggjandi ónýttir.

Framleiðslugjaldið (royalty) er eitt gjald, ið svarar til ein ávísan part av framleiðsluvirðinum av útvunnum kolvetnum.

Fyri myndugleikarnar hevur framleiðslugjaldið tann fyrimun, at tað tryggjar tí almenna ein part av tantøkunum frá kolvetnisframleiðsluni beinanvegin framleiðsluskeiðið byrjar.

Avgjaldið kann vera fastur prosentpartur, sama hvør framleiðslunøgdin er, men eisini kann verða brúktur ein stighækkandi prosentpartur, ásettur eftir framleiðsluni.

Nevndu avgjøldini skulu bert skiljast sum dømi. Eitt heldur er reglan til hindurs fyri, at onnur gjøld verða krevd, eitt nú ágáva og sergjøld (bonus) av ymiskum slag.

Umframt reglur um støddina á gjøldunum, verða eisini reglur í loyvunum um gjaldstíðir, gjaldstreytir og um grundarlagið undir virðisásetingini av útvunnum kolvetnum.

Avgjøld sambært hesi reglu koma ikki í staðin fyri vanligan inntøkuskatt, herundir møguligan serskatt av inntøkum frá olju- og gassframleiðslu.

§ 10. Í loyvum eftir § 6 verða reglur ásettar um brúk av føroyskari arbeiðsmegi, veitingar og tænastur frá føroyskum fyritøkum, um útbúgvingar v.m., umframt hvaðan loyvishavin rekur virksemi sítt.

Viðmerkingar

Sambært hesi reglu skal í leitingar- og framleiðsluloyvunum støða takast til tílík viðurskifti, sum eru av avgerandi týdningi fyri, um samfelagið fær nakað burturúr oljuvirkseminum, umframt møguligan skatt og avgjøld. Her verður hugsað um útbúgving, brúk av føroyskari arbeiðsmegi og veitingar av vørum og tænastum frá føroyskum fyritøkum. Tað verður ikki hildið at vera skilagott at hava gjøllari reglur um hesi viðurskifti í lógini sjálvari, av tí at tílíkar reglur kortini ikki fáa týdning í verki uttan saman við meira nágreiniligum reglum í loyvunum. Á henda hátt gerst tað eisini møguligt at orða skyldurnar eftir at samráðingar hava verið við felagini, ið søkja um loyvi. Handilsavtalur við grannalondini og tær broytingar í hesum avtalum, sum talan kann fara at verða um, verða viðurskifti okkara við ES broytt, tala eisini móti at seta ov bindandi reglur í lógina sjálva.

Í verki verða § 10 og treytirnar í leitingar- og framleiðsluloyvum, umframt umsitingarligar mannagongdir (eftirlit v.m.) av týdningi fyri brúk av føroyskari arbeiðsmegi og vinnupolitikkin annars at taka hædd fyri nevndu handilsavtalum, heimastýrislógini og møguligum seinni avtalum, eitt nú avtaluni frá 22. desember 1992 um ráevni í undirgrundini.

Í umsitingini av hesi reglu má roknast við, at dentur verður lagdur á, at loyvishavin arbeiðir á ein tílíkan hátt, at tað førir til *veruligt búskaparligt virksemi í Føroyum*, t.e. at arbeiðspláss verða útvegað, og at verulig virðisøking verður úrslitið, ella við øðrum orðum eitt positivt íkast til føroysku samfelagsúrtøkuna. Tey í § 10 nevndu viðurskifti kunna verða tikin við í umhugsan myndugleikanna saman við m.a. leitingarvirkseminum, tá veljast skal millum fleiri umsøkjarar, ið søkja um leitingarloyvi á sama øki. Tílík mál, sum her eru umrødd, verða tí ofta ein partur av samráðingunum við umsøkjararnar, áðrenn loyvi verða givin.

Niðanfyri verða nevnd summi av teimum krøvum, sum kunnu verða sett loyvishavum:

Hvat føroyskari arbeiðsmegi viðvíkir, verður møguligt í loyvunum ella í almennum fyriskipanum, smb. § 29, at krevja, at loyvishavin í størst møguligan mun brúkir føroyska arbeiðsmegi. Haraftrat kann verða krav, at loyvishavin greiðir myndugleikunum frá tali av arbeiðsfólki, herundir føroyingum, umframt hvat loyvishavin ger til tess at hera fólkið upp og økja um førleika teirra. Endamálið eigur at vera at økja um førleikastigið hjá føroysku arbeiðsmegini, ið sostatt verður før fyri at átaka sær størv í øllum pørtum av virkseminum hjá fyristøðufelagnum. Álagt kann eisini verða loyvishavanum at siggja til, at arbeiðstakarar og undirarbeiðstakarar senda myndugleikunum líknandi frágreiðingar.

Tað er av týdning at tryggja føroyingum arbeiði hjá loyvishavum, arbeiðstakarum og undirarbeiðstakarum, men tað hevur ikki minni týdning at tryggja føroyskum fyritøkum veruligar møguleikar at luttaka í kappingini við aðrar um arbeiði og veitingar av vørum og tænastum. Álagt kann eitt nú verða loyvishavanum at fylgja mannagongdum, sum latufsstýrið fetar gera m.a. um lisitatiónir og upplýsingar um virksemið, ætlanin er at fara undir. Møguliga kann eisini verða álagt loyvishavanum, tá hann ger av hvør arbeiðstakari fær arbeiðið, at dentur skal leggjast á støðu arbeiðstakaranna til brúk av føroyskum vørum og tænastum, umframt

vanligu kappingartreytirnar sum dygd, tænastu, veitingartíð og prís. Av tí at flestu føroysku fyritøkurnar eru smáar og hava avmarkaða fíggjarorku, kann tað kanska eisini fara at verða skilagott at leggja dent á, um útlendskir veitarar hava hug at samstarva við føroyskar fyritøkur. Tað er eisini møguligt hjá landsstýrinum at hava eftirlit við, um loyvishavin vil brúka føroyskar vørur og tænastur, tá leiðbyggiætlanin verður góðkend, smb. § 14.

Í granslondunum hava krøv um útbúgving serliga miðað ímóti at uppfara starvsfólk í oljuumsitingunum og á jarðfeðistovnum, t.e. løgfrøðingar, búskapartrøðingar, jarðfrøðingar og verkfrøðingar v.m. Tílíkir møguleikar fara sjálvandi eisini at hava stóran týdning at byggja upp vitan hjá viðkomandi føroysku myndugleikum og stovnum (Oljufyrisitingini, Føroya Jarðfrøðisavni v.m.), men haraftrat kann hugsast, at starvsfólk í vinnufyritøkum v.m. fáa tilboð um upplæring í ávísa tíð (on the job training). Somuleiðis kann verða kravt, at loyvishavin medvirkar til, at føroyingar, ið lesa viðkomandi lærugreinir, fáa møguleika fyri serlestur í olju- og gassvirksemi. Tað eigur eisini at kunna verða álagt loyvishavum at lata føroyskar útbúgvingar- og granskingarstovnar taka lut í granskingaretlanum á teimum økjum, ið loyvið fatar um.

Tað hevur stóran týdning, at kolvetnisvirksemið í størst møguligan mun verður rikið úr Føroyum. Tí kann verða kravt, at loyvishavin innan ávísa freist skal lata landsstýrinum eina ætlan um, hvussu virksemið er skipað, og hvar høvuðsstøðin er í leitingarskeiðunum. Tá framleiðslan verður byrjað, kann ein nýggj ætlan verða krevd.

§ 11. Í loyvum eftir § 6 ella í fyriskipanum ásettum av landsstýrinum sambært § 29 verða gjøllari reglur ásettar um, at loyvishavin skal lata inn fíggjarligar og roknskaparligar upplýsingar eins væl og upplýsingar um leitingar- og framleiðsluvirksemi sítt, umframt stakroyndir og aðrar upplýsingar um undirgrundina, hann hevur savnað í virksemi sínum.
Stk. 2. Í loyvum eftir § 6 kunnu ásetast reglur um trúnað viðvíkjandi teimum frágreiðingum og upplýsingum, nevndar eru í stk. 1.

Viðmerkingar
Í **stk. 1** verður rátt landsstýrinum tit, at støða eigur at verða tikin í loyvi ella kunngerð til spurningin um innsending av bæði jarðfrøðiligum og fíggjarligum upplýsingum. Reglan, sum er vanlig í eftirlitslóggávu, hevur til endamáls at gera tað møguligt hjá eftirlitsmyndugleikanum at hava eftirlit við, at reglurnar í lógini og treytir ásettar sambært lógini verða hildnar.

Verður skyldan at lata upplýsingar brotin grovliga og ferð eftir ferð, kann loyvið verða tikið aftur, smb. § 39 ella viðkomandi revsiður sambært § 43.

Fíggjarligar og roknskaparligar upplýsingar eru m.a. ársroknskapur, ársfrágreiðing, fíggjaretlanir og ætlanir um framtíðar fyritakssemi. Fíggjaretlanir og yvirlit yvir framtíðaretlanir fara, umframt at geva myndugleikunum kunnleika um viðurskifti loyvishavans og fíggjarorku, at hjálpa myndugleikunum at meta um støddina av kolvetnisvirkseminum, sum kann hava landsfíggjarligan týdning.

Av upplýsingum um leitingar- og framleiðsluvirksemið kunna verða nevnd úrslit av jarðalisfrøðiligum, jarðfrøðiligum og jarðevnafrøðiligum kanningum. Annars verður vist til viðmerkingarnar til § 30.

Viðvíkjandi **stk. 2** um trúnað er tað sama galdandi um upplýsingar sambært stk. 1, sum nevnt varð í viðmerkingunum til § 5, t.e. upplýsingarnar kunnu vera handilslig leyndarmál.

Tað verður ikki hildið at vera neyðugt at hava reglur um tagnarskyldu í lógini um kolvetnisvirksemi, eins og gjørt varð í § 7 í forkanningarlógini, ella at vísa til reglurnar í revsilógini um tagnarskyldu hjá almennum starvsfólki og øðrum medvirkandi. Grundin er, at spurningurin um tagnarskyldu er viðgjørdur í logtingslóg nr. 132 frá 10. juni 1993 um fyrisiting, ið vísir til revsilógina. Tað verður tí hildið at vera nóg mikið, at

loyvini vísa til fyritsitingarlógina og revsilógina, og at trúnaðarskeiðið, tá ræður um jarðfrøðiligar upplýsingar, verður tilskilað, smb. § 30. Í loyvunum eiga eisini at vera gjøllari reglur um, hvussu myndugleikarnir kunna brúka upplýsingar frá loyvishavunum til kunningar, t.e. til almenn tíðindaskriv, ársfrágreiðingar v.m.

Verður kunngerð týst um innsending av upplýsingum, smb. omanfyri, kunnu reglur vera í kunngerðini sambært § 3, stk. 1 í løgtingslóg nr. 133 frá 10. juni 1993 um alment innlit, um at viðkomandi frágreiðingar v.m. vera undantiknar almennum innliti. Tílík undantøk eru longu gjørd, hvat viðvíkir upplýsingum frá forkanningum.

§ 12. Í loyvum eftir § 6 verður ásett, við fyrivarni fyri reglunum í §§ 20 og 21, í hvønn mun skyldur loyvishavans standa við eftir at loyvisskeiðið er runnið, loyvið latið innaftur ella tikið aftur. Harafturat kann verða ásett, at landsstýrið, um arbeiðsskylda ella aðrar skyldur ikki eru loknar, kann krevja, at loyvishavin fult ella fyri ein part rindar ta upphædd, sum tað hevði kostað at lokið skyldurnar.

Viðmerkingar
Endamálið við reglini í 1. pkt. er at tryggja, at tá ið loyvi gongur út, sama av hvørjari orsøk, er støða tikin til, hvussu verður við fíggjarligu skyldunum, til dømis avgjaldsskyldum ella skyldum at greiða endurgjaldsupphædd, sum liggur á loyvishava sambært reglum ella treytum, ásettum sambært lógini.

Hvat, ið gjørt skal verða við havstøðir hjá loyvishava, eftir at virksemið er steðgað, eru reglur um aðrastaðir, smb. §§ 20 og 21. Møguligur útbúnaður á landi kemur undir avriggingartreytir, ið eru ásettar í loyvinum, smb. viðmerkingarnar til §§ 20 og 21.

2. pkt. viðvíkir teimum førum, har ein loyvishavi ikki hevur lokið skyldur sínar, fult ella partvís, at gera ávís leitingararbeiði ella lokið aðrar líkar skyldur, ásettar í loyvinum. Í tílíkum førum verður tað oftast — eitt nú tá eitt loyvi er bildið uppat — hvørki gjørligt ella skilagott at krevja, at loyvishavin lýkur skyldurna í verki, og landsstýrinum kann tí verða heimilað at krevja skyldurna greiddar í peningi.

Reglan byggir á ta fortreyt, at um landsstýrið er samt í, at eitt nú ein boriskyldu ikki nýtist at vera lokin, m.a. tí at eitki bendir á, at kolvetni fara at verða funnin, kann landsstýrið sleppa loyvishavanum frá at rinda tað, hann sparir við ikki at bora.

§ 13. Leitingar- og framleiðsluvirksemið skal vera forsvarligt og skynsamiligt og samsvarandi viðurkendari góðari altjóða venju undir líkum umstøðum. Virksemið skal vera umhvørvisliga og trygdarliga forsvarligt, og soleiðis at tað slepst undan kolvetnisspetti. Hóskandi atgerðir skulu setast í verk, so tað slepst undan at skaða dýra- og plantulív og at dálka umhvørvið. Virksemið skal ikki vera til óneyðugum vanda ella tarn fyri skipaferðslu, loftferðslu, fiskiskap, etta annað virksemi ella elva skaða etta skaðavanda fyri rørleiðingar, kaðalar ella annan úthúnað.
Stk. 2. Viðgerðarstøðir, rørleiðingar og aðrar flutningsskipanir eiga at hava hóskandi støddir og leggjast soleiðis, at undirstøðukervið sum heild verður virkisført.

Viðmerkingar
Í hesi reglu verða aðalkrøvini til leitingar- og framleiðsluvirksemi sett, herundir serliga at arbeitt eigur at verða forsvarliga og skynsamiliga. Í tilvísingini til altjóða mannagongdir liggur, at tøkni, tilfeingi og trygd eiga at verða havd í huga, tá mett verður um, hvat er forsvarligt og skynsamiligt. Metingin eigur eisini at byggja á tað, sum undir líkum umstøðum alment er viðurkent av oljuídnaðinum.

Sambært reglini í 2. pkt. er tað hann, ið fyri virkseminum stendur (loyvishavin), sum hevur ábyrgdina av at stovna, varðveita og úthyggja eitt fult forsvarligt trygdarstig, soleiðis at eisini slepst undan rásevnisspetti, smb. § 23. Trygdareglurnar í hesi lóg ella kunngerðir, gjørdar sambært lógini og myndugleikanna eftirlit og handhevjan er bara at meta sum eitt fskoyti og leiðbeining til at frenja í verki reglan lógarinnar um fullgott

virksemi. Tað er m. a. tí, at landsstýrið í § 24, lítra b, fær myndugleikan at krevja, at loyvishavin byggir upp eina skipan fyri góðskutrygd (innanfirlit).

Í 3. pkt. verður álagt loyvishavanum og hansara sáttmálapørtum at seta í verk høskilig tiltøk til tess at verja dýr og plantur og umhvørvið annars, meðan pkt. 4 nevnir yrkiskt virksemi av øðrum slagi og annan útbúnað, sum kolvetnisvirksemið ikki óneyðuga eigur at seta í vanda, forða ella skaða. Ætlanin við reglunni er at tryggja, at sleppast kann undan, at fiskiskapur verður óneyðuga og órímiliga hurturtrokaður. Virksemið verður mett at tarna fiskiskapi ella aðrari vinnu óneyðuga, hevði tað kunna gingið fyri seg á øðrum staði, til aðrar tíðir ella á annan hátt, uttan at tað hevði volt honum, ið rekur virksemið, tungar fíggjarligar, rættarligar ella verkligar trupulleikar. Um eitt virksemi er óneyðugt ella ikki, eitt nú samanborið við fiskiskap, má verða gjørt av í hvørjum einstøkum føri.

Reglan vendir sær serliga til loyvishavan og sáttmálapartar hansara, men eisini myndugleikarnir eiga, eitt nú tá góðkenningar verða givnar sambært lógini, at ansa eftir, at tey krøv, ið nevnd eru í regluni, verða lokin. Tað er m.a. tí, at víst verður til § 13 í § 14, stk. 2 um góðkenning landsstýrisins av tilrættaleggingi av framleiðsluni, gongdini og úthónað. At hetta um bjá landsstýrinum í umsitingini av § 13, verður í § 14, stk. 3 um leiðbyggiætlanina álagt loyvishavanum at lýsa tey viðurskifti, umrødd eru í § 13.

Samanhangur er millum stk. 2 og § 18, har ásett verður, at stovnan og rakstur av rørleiðingarskipanum krevur landsstýrisins loyvi. Í § 13, stk. 2 verður ásett, at tá viðgerðarstøðir og rørleiðingar verða bygdar, eigur neyðugt fyrilit at verða havt fyri virkisførinum av undirstøðukervinum. Endamálið við hesum er at tryggja, at fyrilit verður havt fyri teimum viðurskiftum, ið nevnd eru í viðmerkingunum til § 18, herundir at beiði viðgerðarstøðir og rørleiðingar verða tilevnað á tílíkan hátt, at tey í størst møguligan mun medvirka til samfelagsliga skilagóða flutningsskipan og viðgerðarorku.

Mett má verða um í hvørjum einstøkum føri, hvussu útbúnaður eigur at verða tilevnaður fyri at hóska sum best saman við kervinum sum heild. Sagt verður tí, at loyvishavin *eigur* at hava hesi viðurskifti í huga, og tað verða myndugleikarnir, sum sambært § 14, stk. 2 og § 18 fara at meta um, hvussu reglan verður brúkt í verki.

§ 14. Leitt- og aðrar boringar í undirgrundini mega ikki verða byrjaðar uttan so, at landsstýrið frammanundan hevur góðkent útgerð, arbeiðsætlan og mannagongd.
Stk. 2. Loyvishavin kann bert stovna havstøð ella virki og útbúnað á landi at brúka til kolvetnisframleiðslu og fara undir framleiðslu, um landsstýrið frammanundan hevur góðkent eina leiðbyggiætlan sum nevnd er í stk. 3, herundir framleiðslufyrireikingar og -gongd og tann útbúnað, ið nýtast skal.
Stk. 3. Ger loyvishavi av at úthyggja og framleiða ein kolvetnisfund, skal hann gera eina ætlan (leiðbyggiætlan), ið skal sendast til góðkenningar eftir stk. 2. Í ætlanini skulu vera upplýsingar og metingar um kolvetnisfundin og úvinning av honum, umframt upplýsingar og metingar av tekniligum, fíggjarligum, tryggdarligum, umhvørvisligum slagi og um fiskivinnu og siglingarviðurskifti saman við einari frágreiðing um týdningin av byggiætlanini fyri búskap og arbeiðsvinnu. At enda skal vera greitt frá, hvussu virki og útbúnaður kunnu verða frágingin, tá virksemið verður niðurlagt. Verður bygt í tveimum ella fleiri umførum, eigur ætlanin, so langt til ber, at fata um alla byggingina.
Stk. 4. Góðkenning landsstýrisins av leiðbyggiætlanini, herundir seinni góðkenningar av serskildum byggistigum og støkkum virkjum og virkislutum eftir reglum, givnar sambært § 24, skal vera fingin áðrenn gingið verður í mannandi sáttmálabundnar skyldir, uttan so at landsstýrið frammanundan gevur sítt samtykki.
Stk. 5. Talar fyrilit fyri forsvarligari og skynsamiligari framleiðslu fyri tí, ella er tað neyðugt orsakað av týdningarmiklum samfelagsáhugamálum, kann landsstýrið gera broytingar í góðkendum framleiðsluætlanum og laga framleiðsluna samsvarandi til.

Viðmerkingar
Her verða krøv sett um góðkenning landsstýrisins av ávísum fyritakssemi, sum t.d. boringar, leiðbyggitig

og byrjan av framleiðslu. Harumframt verður landsstýrinum heimilað undir heilt serligum umstøðum at broyta góðkendar framleiðsluætlanir. Stk. 1 fevnir um allar boringar, leitiboringar íroknaðar, meðan stk. 2 – 5 hevur týdning í teimum førum, har loyvishavin hevur gjørt raksturverdan fund, sum hann ætlar at seta í framleiðslu.

Stk. 1 sigur, at boringar í virksemi eftir hesi lóg krevja góðkenning landsstýrisins. Loyvishavi, sum samhæft loyvi eftir § 6 (konsessión) ætlar at bora á øki, ið loyvið fevnir um, hevur sostatt skyldu til at søkja um góðkenning. Ískoytisreglur um onnur arbeiði, herundir forkanningar av ymiskum slag, er ætlanin at seta í fyriskipanir sambæri § 29.

Tá mett verður um eina umsókn, verða úgerð, arbeiðsætlan og mannagongd at hava í huga. Reglan hevur tvídirskilda heimild at krevja, at broytingar verða gjørdar í innsendu tilfarinum og tryggdartiltøkum virkseminum viðvíkjandi, ið verða mettar at vera neyðugar at tryggja, at arbeiðið verður gjørt forsvarliga og skynsamiliga og forða fyri, at skaði verður valdur persónum, ognum, umhvørvi og útbúnað. Áherðsla verður løgd á, at landsstýrið eigur at gera eina heildarmeting av ætlaða arbeiðinum, herundir av tryggd, jarðgoymslu og øðrum viðurskiftum, sum eru nevnd í § 13. Hugsast kann, at boriloyvi verður avmarkað til ávísar árstíðir fyri ikki at koma til hindurs fyri fiskiskap. Somuleiðis kunnu treytir verða settar umhvørvinum til fruma.

Hóast góðkenning er fingin eftir hesi reglu, skulu møguligt loyvi, ið krevjast sambæri aðrari lóggávu, verða útvegað, eitt nú loyvi at veita borievni á sjógv sambæri havumhvørvislógini.

Sambæri **§ 14, stk 2** krevst, at loyvishavin fær landsstýrisins loyvi, áðrenn hann fer undir *framleiðslu* av kolvetni. Umframt tað krevst, at landsstýrið góðkennir bæði framleiðslugongdina og framleiðsluútbúnaðin. Landsstýrið ansar eftir, áðrenn góðkenning verður givin, at tey viðurskifti, nevnd eru í § 13, eru í lagi, og fer eisini at tryggja, at verandi ella ætlaðar viðgerðar- ella flutningsskipanir verða brúktar á skilagóðan hátt. Tørvur kann serliga verða á hesum, tá framleiðslan er vorðin so stór, at eitt nú tørleiðingar eru lagdar av leiðunum inn á land ella oljuviðgerðarvirki eru bygd á landi.

Stk. 3 krevur av loyvishavaranum, vil hann hava góðkenning sambæri **stk. 2**, at hann letur gera eina ætlan um bygging og rakstur av kolvetnisfundinum at leggja fyri landsstýrið til góðkenningar.

Í 2. pkt. er útgreinað, hvørjar upplýsingar og metingar skula vera í ætlanini. Á hendan hátt verður gjørligt hjá tí almenna at meta um líkindini at útvinna kolvetni úr jarðgoymslunum og at hava eftirlit við, at loyvishavin rekur virksemi sítt samsvarandi teimum ætlanum, ið liggja undir reglunum í § 13. Kravt verður eisini, at ætlanin hevur upplýsingar og metingar um týdningin av verkætlanini fyri búskap og arbeiðsvinnu. Á hendan hátt verður møguligt hjá landsstýrinum at meta um, hvørt byggiætlanin er samsvarandi aðalendamálunum við lógini, smb. § 1, stk. 2 við viðmerkingum. Tá kravt verður í 3. pkt. at greitt skal verða frá í ætlanini, hvat gerast skal við virki og útbúnað, tá virksemið verður niðurlagt, er hetta við tí endamáli at eggja loyvishavaranum til at meta um hendu partin av virksemunum, longu tá leiðin verður bygd. Leiðreglur fyri, hvussu havstøðir, pallar v.m. skula verða heind burtur, tá tey ikki verða brúkt longri, eru m. a. at finna í samtyktini frá 19. oktober 1989 hjá Sjóvinnufelagsskapinum IMO, og eiga havstøðir samsvarandi hesum reglum at verða bygdar á ein tílíkan hátt, at tær kunnu verða burturheindar. Annars verður víst til viðmerkingarnar til §§ 20 og 21.

Í seinasta pkt. í stk. 3 verður áskilt, at verður bygt í fleiri umførum, skal ætlanin solangt tilber fata um alla byggingina. Tað fylgir náttúrliga av hesi reglu, at landsstýrið kann avmarka góðkenningina til viðkomandi part av ætlanini.

Ætlanin við reglini í **stk 4** er at forða fyri, at loyvishavin longu hevur gjørt sáttmálar um tilmandi veitingar, áðrenn hann sendir leiðbyggiætlanina til góðkenningar og á tann hátt leggur hand á myndugleikarnar, tí ræður um hvør loysn skal verða vald. Loyvishavin átekur sær ógvuliga stórar skyldur í eini leiðbygging, og tað hevur tí týdning, at byggiætlanin verður góðkend av myndugleikunum so skjótt sum gjørligt, soleiðis at

loyvishavin kann vera nøkulunda tryggur í, at fortreytirnar fyri ílogunum kunnu verða góðkendar av myndugleikunum. Til tess at fáa byggiætlanina góðkenda so tíðliga sum møguligt, hevur tað týdning, at myndugleikar og loyvishavi tosa saman óformuliga, longu meðan loyvishavin ger ætlanina, soleiðis at tað slepst undan, at eitt ógvuliga stórt fyrireikandi arbeiði fer fyri skeytið orsakað av formligu málsviðgerðini.

Dentur verður lagdur á, at landsstýrisins góðkenning vanliga verður avmarkað til tær høvuðslinjur fyri bygging og rakstri, ið eru tit skjals í teirri innlatnu ætlanini. Roknað eigur at vera við, at góðkenningarnar verða treytaðar av, at loyvishavin seinni, tá verkætlanin er gjøllari viðgjørd, sendur inn nýggjar metingar og sundurgreiningar, har tann góðkenda leiðbyggiætlanin verður undirbygd, meira viðgjørd og dagførd, smb. eisini tilvísingina til § 24. Roknað má eisini verða við, at trygdarreglurnar, ið verða lýstar sambært § 24 fata at hava krøv um, at útbúnaðurin ikki verður tikin í brúk, fyrr enn serligt loyvi er lingið frá myndugleikunum.

Endaliga kann verða nevnt, at stk. 4 eisini kann brúkast til at tryggja landsstýrinum betri eftirlit við, at loyvishavin lýkur tær treytir, ið settar eru sambært § 10 um brúk av føroyskum veitingum og tænastum.

Í **stk. 5** er hugsað um tey føri, tá tann vitan, ið fingin er um jarðgoymsluna, talar fyri, at framleiðslutgongdin, sum er góðkend sambært stk. 2, verður broytt í bráðskundi, t.d. fyri at tað slepst undan óbøtandi skaða av goymsluni.

Millum tey samfelagsáhugamál, hugsað verður um, er møguleikin fyri at broyta ásettu framleiðslugongdina í altjóða kreppustøðum, soleiðis at ásett verða annaðhvørn framleiðsluloft ella minsta framleiðsla.

§ 15. Røkkur kolvetnisfundur um øki hjá fleiri loyvishavum, skulu teir samskipa leiting og møguliga framleiðslu. Slíkar avtalur skulu góðkennast av landsstýrinum. Fæst ikki semja um samskipan innan rímiliga tíð, kann landsstýrið geva boð um samskipan og áseta treytirnar.
Stk. 2. Røkkur kolvetnisfundur inn á landgrunn ella yvirvaldsøki hjá øðrum landi, kann landsstýrið, verður avtala um samskipan av leiting og framleiðslu gjørd við hetta landið, geva honum, ið loyvi hevur til føroyska partin, boð um at taka lut í tílíkari samskipan og áseta treytirnar.

Viðmerkingar
Reglan í stk. 1 tryggjar, at ein fundur, sum er býttur millum ella fatar um fleiri øki, og sum fleiri loyvishavar hava fingið einkarrætt til, verður gagnnýttur sum ein heild við teimum støðis- og rakstrarfíggjarligu fyrimunum, hetta vanliga hevur við sær.

Ein avtala um samskipaða leiting og framleiðslu er vanliga rættiliga umfatandi og hevur m. a. reglur um, hvussu fundurin verður býttur millum loyvishavarnar. Í 2. pkt. verður staðfest, at tílíkar avtalur skulu verða góðkendar. Á henda hátt kann verða tryggjað, at einki er í avtaluni, sum gongur ímóti samfelagsins áhugamálum. Í flestu førunum fer loyvishavaris fíggjarligi áhugi í skynsamari nýtslu at tala fyri einari samskipan. Liðir 3. pkt. hevur landsstýrið møguleika at krevja samskipan, um so er, at loyvishavararnir ikki sjálvir eru førir fyri at semjast um eina avtalu. Í orðunum *innan rímiligan tíð* liggur m. a., at semja skal verða gjørd í so góðari tíð, at hædd kann verða tikin fyri samskipanini, tá framleiðsluloðinaðurin verður bygdur. Reglan er eisini galdandi í teimum førum, har ein oljufundur røkkur um fleiri øki, ið sama fyritøka hevur loyvi í.

Stk. 2 umrøður fundir, ið røkka inn á landgrunn ella yvirvaldsøki hjá øðrum landi. Ein samskipað leiting og framleiðsla kann eisini í tílíkum føri vera fortreyt fyri skilagóðari gagnnýting. Eisini í tílíkum førum kann reglan nýtast at tryggja samskipan. Tílíkar samskipanaravtalur verða vanliga gjørdar fyri hvønn fund sær eftir samráðingar landanna millum, sum eisini loyvishavarnir taka lut í. Umframt avtalurnar landanna millum er vanligt, at loyvishavarnir gera avtalur sínamillum.

§ 16. Eiga tveir ella fleiri kolvetnisfundir at verða samtreyttir av tí at fyrtlit fyrt tilfeingi, búskapi ella samfelagsáhugamálum tala fyri tí, kann landsstýrið, tá ið tað hevur ráðfært seg við loyvishavarnar, geva boð um at hetta verður gjørt. Í hesum sambandi kann áleggjast loyvishava móti gjaldi at lata vøgerðar- og flutnings

búnað til nýtslu í tílíkum samstarvi. Semjast loyvishavarnir ikki um gjaldið, verður tað ásett av landsstýrinum.

Viðmerkingar
Henda regla loyvir, at § 15 eisini kann verða brúkt í førum, har tveir ella fleiri fundir eiga at verða samtroyttir av tilfeingis-, búskapar- ella samfelagsáhugamálum. Eitt nú kann tað hugsast, at smærri fundir fyrimunadliga kunnu verða samtroyttir við felags viðgerðargøgnum. Eisini kunnu kolvetni úr einum fundi verða viðgjørd á viðgerðarstøð hjá øðrum loyvishava, sum hevur nóg stóra avlopsorku. Roknað verður tá við, at hetta ikki er til hindurs fyri virksemið hjá eigarunum ella ger tað torførari.

Ætlanin er í størst møguligan mun at lata partarnar sjálvar avtala einstøku treytirnar fyri samskipanini.

§ 17. Kolvetni, ið ikki eru brúkt í framleiðsluni, sprænd innaftur, brend ella farin fyri skeytið, skulu takast í land í Føroyum, uttan so at landsstýrið góðkennir annað. Landsstýrið kann áseta treytir fyri góðkenningini.

Viðmerkingar
Reglan ásetir skyldu at taka tu olju í land, sum framleidd verður á føroyska landgrunninum. Undantikin eru kolvetni, sum verða sprænd inn aftur í jarðgoymsluna, brend ella fara fyri skeytið í framleiðsluni. Landsstýrið kann veita undantaksloyvi frá kravinum og sambært reglunum í 2. pkt. seta treytir fyri undantaksloyvinum.

Hóast rakstrarverdir kolvetnisfundir verða gjørdir á føroyska landgrunninum, má avgerðin um at olja og/ella gass skal takast í land í Føroyum ætlast at liggja nakað langt inni í framtíðini. Vanliga verður støða tikin til, um olja skal takast í land, tá leiðbyggingin verður góðkend, sbr. § 14, og spurningurin verður vanliga viðgjørdur sum ein samanhangandi partur av byggingini og gagnnýtingini av kolvetnisfundinum. Góðkenna kolvetnismyndugleikarnir eina leiðbygging, heruppá loyvi at taka olju/gass í land í Føroyum, skal loyvishavin kortini siggja til eisini at fáa góðkenningar og loyvi frá øðrum myndugleikum. Eitt nú krevur bygging av móttøkustøðum á landi v.m. loyvi frá byggimyndugleikum á staðnum, náttúrufriðingarmyndugleikum, umhvørvismyndugleikum v.m. Tað, at spurningurin um at taka oljuna í land verður viðgjørdur saman við útbyggingini og gagnnýtingini av leiðini sum heild, hevur tann fyrimun, at loyvishavin sambært § 22 skal gera eina meting um fylgjur fyri umhvørvið, áðrenn landsstýrið tekur støðu til leiðbyggiætlanina.

Tað verður neyvan búskaparligt og tøkniligt skil í at leggja rørleiðingar til Føroyar frá einstøkum og smáum kolvetnisfundum, ið møguliga hava fyrivurat liggja langt úr land. Í tílíkum førum verður neyðugt at føra kolvetnini við skipi (til Føroya ella uttanlands) ella gjøgnum rørleiðingar hjá grannlondunum (uttanlands). Inntil framleiðslan á landgrunninum hevur fingið eina ávísa stødd, má tí verða roknað við, at metingar í hvørjum einstøkum føri kunnu gera, at tað loysir seg best at senda kolvetnini beinleiðis á marknaðin ella til eina útlendska olju- ella gassmóttøkustøð. Somuleiðis kann verða roknað við, at umstøðurnar verða ymiskar fyri olju og gass orsakað av fíggjarligum og tøkniligum ávum.

At gera tað møguligt hjá tí almenna at tryggja eina í størst møguligan mun sjálvstøðuga leitingar- og serliga framleiðslugongd á landgrunninum, og fyri ikki at gerast óneyðuga bundin av undirstøðukervinum og flutningsmøguleikunum á landgrunnum grannalandanna, má tað haldast at samsvara best við landsins áhugamál, um olja bert í undantaksførum verður tikin í land uttanlands og bert við loyvi frá landsstýrinum. Stóð tað felløgunum frítt at taka kolvetni í land, har tey vildu, hevði tað kunna hent, at kolvetnisvirksemið á føroyska landgrunninum sum tíðin leið gjørdist bundið av rørleiðingum og móttøkustøðum í grannalondunum, bundið av krøvum grannalanda um avmarking av teimum nøgdum, ið fyrst kundu fíggjøgnum teirra leiðingar, og grannalanda krøvum um gjøld og vørulýsingar. Afturat hesum kemur, at verða kolvetnini tikin í land uttanlands fáa Føroyar ikki lut í teirri virðumenning við avleiddum ávirkanum á arbeiði, skattainntøkur o.a., sum landið annars kundi havt í væntu, vórðu olju- og gassmóttøkustøðir bygdar og riknar í Føroyum.

Skyldan at taka kolvetni í land gevur við øðrum orðum landsstýrinum eftirlit við olju- og/ella gassflutningi av leiðum á føroyska grunninum. Tað, at skyldan verður staðfest í sjálvari lógini, ger at loyvishavar fáa at vita, frá tí at leitingin byrjar, at kolvetnini skal verða tikið í land í Føroyum. Tað er at vænta, at leiðbeiningar ætlanir loyvishavanna fara at endurspegla hetta krav, og góðar tøknitiligar og fíggjarligar grundir skulu tala fyri, skal samtykki verða givið um at føra oljuna uttanlands.

2. pkt. í regluni heimilar landsstýrinum at seta krøv, skal undantak verða gjørt frá kravinum um at taka kolvetni í land. Endamálið við hesum er tvíbýtt: *partvís* setir heimildin landsstýrið í betri samráðingarstøðu, tá ið støða skal verða tikin til at føra kolvetni í land uttanlands, og *partvís* gevur ásetingin landsstýrinum møguleikar at samráðast um vinnumenningar- og arbeiðsmøguleikar sum loysn í staðin fyri eina støð o.a. Tær treytir, sum landsstýrið man fara at seta fyri at víkja frá kravinum, fara fyri tað mesta at vera slíkar, ið virka arbeiðsskapandi.

§ 18. Loyvi landsstýrisins krevst til tess at leggja og reka rørleiðingarskipanir at brúka í virksemi, tevnt av hesi lóg.
Stk. 2. Í einum loyvi kunnu setast treytir um rørlegu, støddir, ognarviðurskifti, annara rætt at brúka rørleiðingina, gjald v.m.
Stk. 3. Stk. 1 og 2 eru ikki galdandi fyri innanhýsis rørleiðingar í framleiðsluútbúnaði á stakari leið.
Stk. 4. Røkkur rørleiðingin inn á landgrunn ella yvirvaldsøki hjá øðrum landi, kann landsstýrið, verður avtala gjørd við hetna landið um at leggja og reka rørleiðingina, geva honum, ið loyvi hevur frá føroyska partin, boð um at taka lut í avrádda samstarvinum og áseta treytirnar.

Viðmerkingar
Sum nevnt í viðmerkingunum til § 17 má ráolja frá einstøkum og smáum leiðum væntast at verða flutt til lands við skipi. Fer framleiðslan ávísa støddi, tekur spurningurin seg upp, um rørleiðingar skulu verða lagdar. At leggja rørleiðingar at flyta oljuna, kann geva fyrimunir, bæði hvat viðvíkir umhvørvinum og møguleikanum at gagnnýta smáar leiðir, sum valla verða settar í framleiðslu, er eingin rørleiðing til taks. Jarðgass verður flutt í land í rørleiðingum. Bara í teimum førum, tá ið stórar leiðir liggja langt burturi, kann tað lýsa seg at dropa gassið og føra tað til lands í serbygdum tangaskipum.

Umhvørvisliga verður tað hildið vera meira vágið at pumpa olju úr eini fermiboyu ella einum guyansluskipi í eitt tangaskip enn at flyta hana gjøgnum rør, tí at vandin fyri leka er størri, tá ið soleiðis verður flutt, enn vandi fyri leka frá rørleiðing. Harafturat kemur, at oljuflutningur úr fermiboyu til tangakip ikki ber til í øllum veðri, og tí má framleiðslan í summum førum verða stedgað. Verða rørleiðingar brúktar, slepst mestsum undan framleiðsluslitum.

Stk. 1 sigur, at tað at byggja og reka rørleiðingar at brúka í virksemi, sum hevur fingið loyvi eftir hesi lóg, krevur loyvi frá landsstýrinum. Endamálið við hesi reglu er at halda skil á, av tí at stendur leløgunum frítt at leggja rørleiðingar á grunninum, kann annað virksemi hetuliga verða órógvað, eitt nú legging av samskiftiskaðalum, botntroling v.m. Gjørt verður vart við, at rørleiðingar eru havstøðir, sml. § 2, litra b) ii), og tí undir trygdarkrøvum og eftirliti sambært kap. 5 í hesi lóg.

Slík loyvi kunnu eftir **stk. 2** verða treytað av krøvum um linjuføring, støddir, ognarviðurskifti, nýtslugjald v.m. Krav um at landsstýrið skal góðkenna linjuføringina, kann gera tað møguligt at royna at sleppa undan teimum vansum, sum kunnu standast av rørleiðingunum, sml.viðmerkingarnar til stk. 1, eitt nú soleiðis at ávísar trolleiðir fáa frið ella at serligur útbúnaður verður gjørdur til verju av samskiftiskaðalum o. a.

Aðrar treytir um støddir, ognarviðurskifti, rætt hjá øðrum at brúka rørleiðingarnar og brúksgjald, kunnu medvirka til at tryggja, at rørleiðingar verða lagdar og riknar soleiðis, at tann vanligu sera stóri úthúnaðurin í størst møguligan mun kann verða bygdur og rikin á samskipaðan og rímiligan hátt og soleiðis, at undirstøðukervið sum heild verður virkisfør, sml. § 13, stk 2.

Á sama hátt sum samfelagið hevur áhuga í, at kolvetnisvirksemið á føroyska landgrunninum ikki verður av fast bundið at rørleiðingunum á landgrunninum grannalanda, smb. viðmerkingarnar til § 17, hevur tað avgerandi týdning, at eitt nú ein verulig einkarættarstøða viðvíkjandi rørleiðingum á landgrunninum ikki verður misnýtt av eigarunum mótvegis øðrum loyvishavum.

Avleiðingin av órímiligum krøvum um gjøld fyri flutning gjøgnum rørleiðingar, kann í ringasta føri vera, at smáleiðir bera seg ikki orsakað av ov høgum flutningsgjøldum, og tí ikki verða gagnnýttar. Tí verður hildið skynsamt, um tað ber til at seta treytir í loyvunum sambært stk. 1 um flutningsorku í rørleiðingini við atliti at flutningi fyri triðjamann, kann hetta gerast á tiggjarliga forsvarligan hátt.

Innanhýsis rørleiðingar, sum eru ein samanhangandi partur av eini framleiðslueind, koma ikki undir reglurna í stk. 3, av tí at hesar rørleiðingar væntandi verða viðgjørdar í sambandi við, at landsstýrið góðkennir leiðbyggiætlan, smb. § 14. Rørleiðingar millum leiðir eru ikki undantiknar frá kravinum um serligt loyvi eftir stk. 1, smb. stk. 3. Í hesum viðfangi kann verða nevnt, at § 18 ikki er galdandi fyri rørleiðingar til millumlanda flutning á landgrunninum, av tí at tær eru undir serligum reglum í § 19.

Stk. 4 hevur í roynd og veru sama endamál sum § 15, stk. 2 um samskipan, av tí at reglan heimilar landsstýrinum, er avtala gjørd við grannaland um legging og rakstur av rørleiðing, sum fer um mark, at krevja, at tann, sum loyvi hevur til føroyska partin av rørleiðingini, tekur lut í avtalaðu samstarvinum. Vanliga hava tey oljufeløgini, sum leggja rørleiðingina, eisini gjørt umfatandi avtalur um bygging og rakstur við samstarvspartar sínar í grannalandinum. Reglan heimilar eisini landsstýrinum at seta føroysku loyvishavunum treytir fyri luttøku teirra í samstarvinum. Reglan tryggjar soleiðis landsstýrinum ein avgerðarætt innefitir, var millumlanda avtala á stjórnarstigi gjørd um umsjón og onnur nyttugleikamál.

§ 19. Loyvi landsstýrisins krevst til tess at leggja og reka undirsjóvar rørleiðingarskipanir til millumlandaflutning á føroyskum landgrunnsøki. Í góðkenningini skal tilskilast, hvar hesar rørleiðingar verða lagdar og treytir skulu setast um rímiligar atgerðir við atliti at leitingarvirksemi á landgrunninum, gagnnýting av náttúruforkidømi hansara og fyribyrging, avmarking og eftirliti við dálking frá rørleiðingum.

Viðmerkingar

Rætturin at leggja undirsjóvarkaðalar og rørleiðingar verður roknaður sum eitt av havsins frælsum, men tá ið hesin rættur verður framdur á landgrunni hjá øðrum ríki, er neyðugt at viga ímillum áhugan hjá strandarríkinum og áhugan hjá ríkinum, ið ætlar at leggja kaðalarnar ella rørleiðingarnar. Í altjóða rætti eru reglur, sum viga áhugan hjá pørtunum ímóti hvør øðrum, í landgrunnssáttmálanum § 4, sáttmálanum um havsins frælsi §§ 2 og 26 og í havrættarsáttmálanum grein 79. Síðst nevnda grein staðfestir í nr. 1 ein almennan rætt hjá øðrum ríkjum at leggja undirsjóvarkaðalar og rørleiðingar á landgrunni hjá strandarríki við virðing fyri tí, ið sagt verður í nr. 2 – 5.

§ 19 í lógini byggir á tær avmarkingar, sum altjóða rættur ger í løgdømi strandarríkisins yvir annara landa kaðalum og rørleiðingum á landgrunni strandarríkisins. Rørleiðingar til millumlanda flutning eru leiðingar millum lond, sum liggja á landgrunni hjá triðjalandi. Á føroyskum grunni er torført at ímynda sær slíkar leiðingar, men við teirri meining, ið er í flutningsstøkni, verður hildið skynsamt at hava eina reglu, sum samsvarar við § 79 í havrættarsáttmálanum.

Sambært reglini skal landsstýrið góðkenna linjuføringina og annars siggja til, at leiðingarnar serstakliga ikki eru til ampa fyri olju- og gassvirksemi og fiskiskap, sum er á grunninum. Harumframt kann landsstýrið seta í verk rímilig tiltøk til at fyribyrgja, avmarka og hava eftirlit við dálking frá rørleiðingum.

Viðmerkjast skal, at reglan bara er galdandi fyri rørleiðingar til millumlanda flutning á landgrunninum, t.e. rørleiðingar, sum ikki røkka inn á føroyskt sjóøki. Í teimum førum, tá ið rørleiðingar verða fordar tvørtur um sjóøki og møguliga upp á land, hevur strandarríkið sambært altjóða rætti størri rætt at áseta reglur, t.d. eftir § 18 í lógini, fyri tílíkar kaðalar og rørleiðingar.

§ 20. Hildið kann einans verða endaliga uppat við rakstri og viðlíkahaldi av havstøð til framleiðslu, eftir at landsstýrið frammanundan hevur givið sína góðkenning. Loyvishavin skal við freist eftir stk. 3 leggja eina avriggingarætlan fyri landsstýrið við neyðugum upplýsingum og metingum um tøkni, trygd, umhvørvi, fiskiskap, sigling og búskap saman við uppskoti um hvussu havstøðin kann verða frágingin.
Stk. 2. Havstøðin skal samsvarandi altjóða reglum framhaldandi verða brúkt í kolvetnisvirksemi sambært hesi lóg, til annað endamál ella burturbeinast heilt ella partvís. Loyvishavin skal fremja avriggingarætlanina innanfyri ta freist og samsvarandi teimum treytum, landsstýrið hevur sett í góðkenning síni av ætlanini. Rennur freistin frá tí at hildið verður uppat at brúka havstøðina, skal loyvishavin boða landsstýrinum frá, tá hildið verður uppat.
Stk. 3. Avriggingarætlanin skal sendast inn í seinasta lagi tvey ár innan loyvishavin roknar við at hildið verður uppat at brúka havstøðina. Sama er galdandi um loyvisskeið eftir §§ 6 og 18 í hesi lóg eru runnin, hendir tað áðrenn roknað er við at halda uppat. Landsstýrið kann krevja avriggingarætlanina fyrr, um umstøðurnar tala fyri tí. Somuleiðis kann landsstýrið til hvørja tíð geva loyvishavanum boð um at prógva førleika sín at fíggja avriggingarætlanina ella veita neyðuga trygd, metir landsstýrið seg at hava grund til at halda, at loyvishavin ikki fer at hava neyðuga peningin tøkan.

Viðmerkingar
Eins og landsstýrið skal góðkenna, at havstøð verður sett á landgrunnin eftir § 14, stk. 2, má landsstýrið hava innlit í, hvat gerast skal við støðir, sum fara úr nýtslu. Ikki bara við fyriliti fyri fiskiskapi og sjóferðslu, men eisini tí at landið samsvarandi altjóða rætti er bundið at síggja til, at slíkar støðir verða burturbeindar heilt ella partvís. Harafturat kemur áhugin hjá landinum í, hvussu farið skal verða fram í teimum førum, tá ið støðin verður upphøgd, endurbrúkt ella frágingin. **Stk. 1** áleggur tí loyvishavanum skyldu at fáa góðkenning landsstýrisins, áðrenn hildið verður endaliga uppat við rakstri og viðlíkahaldi av havstøð til framleiðslu. Stytri framleiðslusteðgur, eitt nú til umvælingar, krevur ikki góðkenning landsstýrisins.

Krav**ið** um innlating av avriggingarætlan er galdandi fyri havstøðir, soleiðis sum tær eru allýstar í § 2, litra b) í lógini. Framleiðsluskip og -pallar, framleiðslueindir á havbotni, ella rørleiðingar eri dømi um havstøðir, ið eru fevndar av kravi um avriggingarætlan. Útskifting av einstøkum lutum av einari havstøð, eitt nú viðgerðartólum, krevur ikki avriggingarætlan. At seta propp í eitt borihol krevur heldur ikki avriggingarætlan, men tó krevst samtykki frá myndugleikunum, av tí at hetta vanliga er treyt fyri borigóðkenning eftir § 14, stk. 1 og/ella sambært trygdarforskriftum fyri boring. Í hesum sambandi kann eisini verða viðmerkt, at góðkenning landsstýrisins av avriggingarætlan sleppur ikki loyvishavanum undan at søkja um loyvi og góðkenningar sambært aðrari lóggávu, t. d. umhvørvislóggávu.

Krav**ið** um at loyvishavin skal leggja avriggingarætlanina fyri landsstýrið tryggjar, at avriggingin av einari leið verður viðgjørd eftir somu umsitingarligu mannagongdum sum byggingin av leiðini, smb. § 14. Um freistirnar fyri innlatingini av avriggingarætlanini verður víst til viðmerkingarnar til stk. 3 niðanfyri.

Umframt landstýrisins góðkenningarheimildir og skyldur loyvishavans at senda inn avriggingarætlan ásetir stk. 1 eisini reglur um innihaldið í ætlanini. Við reglum er deutur lagdur á, at loyvishavi í avriggingarætlanini tekur støðu til somu viðurskifti, sum eru galdandi í leiðbyggingini. Grundin til at álagt verður loyvishavanum at taka fíggjarligar upplýsingar við í avriggingarætlanina er, at avriggingarútreiðslur loyvishavans hevst geva rætt til frádrátt sambært skattalóggávuni. Sum skattkrevjandi myndugleiki hevur tað almenna tí áhuga í at arnsa eftir, at avriggað verður so bíliga sum møguligt. Fíggjarligu fyrimunirnir við einum møguleika skulu kortini sammetast við onnur krøv, eitt nú tøkni, umhvørvi, fiskiskap v.m. sambært reglum.

Mint eigur at verða á, at tá leiðbyggiætlanir verða góðkendar eftir § 14 verður sum bovnðsregla kravt, at virki og útbúnaður verða bygd soleiðis, at tey kunna burturbeinast. Í tí einstaka førinum kann kortini hugsast, at burturbeining av einari havstøð, eitt nú einari rørleiðing, má haldast at fara at kosta so nógv og at trygdar- og umhvørvisvandin er somikið lítil, at betri er at lata rørleiðingina verða liggjandi. Burturbeining – hóast hon er ein møguleiki sambært stk. 2 – er í royndi og veru ikki serliga skilagóð loysn í hesum fori. Í tílíkum førum fara partar av havstøðini altíð at verða burturbeindir, men høvuðsparturin verður liggjandi

(lutvís burturbeining). Í hesum sambandi kann verða nevnt, at strandaríki eftir altjóða rætti ikki hava skyldu at beina rørleiðingar burtur, av tí at tær ikki vanliga eru til ampa fyri sigling. Annars verður eisini hildið, at rørleiðingar, verða tær reinsaðar fyri olju, fyltar við sjógvi og afturlatnar, eru ikki umhvørvisvandi.

Tá valt verður millum teir møguleikar, nevndir eru í stk. 2, hevur tað týdning at avriggingaraetlanin og landsstýrisins góðkenningin av henni hava í huga ta loysn, sum best er fyri umhvørvi og fiskivinnu, tó soleiðis at fyrivarni má vera havt fyri tøkni, trygd og búskapi.

Mint verður á, at § 20 bert er galdandi fyri havstøðir. Hetta er tí at roknað verður við, at leiting og møgulig framleiðsla helst verður á sjónum. Verður talan um framleiðslu- ella viðgerðarútbúnað, móttøkustøðir v.m. á landi verður gjørligt at sela tilsvarandi treytir um avrigging í loyvi ella byggigóðkenningar.

Stk. 2, 1. pkt. sigur, hvat gerast kann við eina havstøð, sum ikki longur verður rikin ella hildin viðlíka. Tær kunnu *framhaldandi verða brúktar til kolvetnisvirksemi* eftir lógini, brúktar **til** *annað endamál ella burturbeindar* heilt ella partvís. Metast má um í hvørjum einstokum **føri**, hvør møguleiki verður valdur og tey viðurskifti, nevnd eru í stk. 1, eiga at verða **havd** í huga. Hvussu stórur dentur verður **lagdur** á tey ymsu viðurskiftini í avriggingaraetlanini veldst um, hvønn møguleika aetlanin er at brúka. Í málsviðgerðini kann landsstýrið altíð krevja fleiri upplýsingar. *Framhaldandi brúk til kolvetnisvirksemi* kann í verki koma uppá tal fyri nógvar havstøðir, eitt nú um loyvisskeiðið er runnið, men framvegis verður framleitt á leiðini, ella um havstøðin verður brúkt til tænastuveitingar til grannaleiðir. Er framleiðslan ikki hildin uppat, tá loyvisskeiðið er runnið, talar alt fyri, at loyvishavin søkir um nýtt framleiðsluloyvi, møguliga tá hann sendir inn avriggingaraetlan. Endurnýgging av loyvinum er náttúrligasta loysnin í tílíkum førum og verður ti stødgað við avriggingini í nøkur ár.

Er havstøð bygd við endurbrúki á aðrari leið í huga, sum serliga kann koma uppá tal við flytandi eindum, er tílík endurnýtsla skilabesta loysnin. Hetta merkir, at havstøðin verður burturbeind av teirri leiðini, sum er undir avrigging.

Brúk til annað endamál kann eitt nú hugsast at vera sum fiskimið ella til granskingarendamál. Á hendan hátt slepst undan burturbeining og útbúnaðurin fær longri livitíð. Millum tær treytir, sum helst verða settar, áðrenn góðkent verður at ein havstøð kann brúkast til annað endamál, verður, at vandamikil evni og leysir lutir verða burturbeind. Harafturat fer landsstýrið at kunna tryggja sær, at greiða verður fingin á ábyrgdarbýtinum millum loyvishavan og møguligar nýggjar brúkarar, eitt nú viðvíkjandi skaða, avmerking og viðlíkahaldi.

Burturbeining kann sambært reglum verða heil ella partvís. Tí talan er um burturbeining verður útbúnaðurin annaðhvørt søktur, tikin í land ella endurbrúktur (til kolvetnisvirksemi ella annað endamál). Oftast verður talan um samansettar loysnir. Tá ið burturbeiningin bara er fyri ein part, er tað týdningarmikið, at loyvishavi í avriggingaraetlanini lýsir, hvat hann hevur í hyggju at gera við tann partin, sum ikki verður burturbeindur. Sum áður nevnt, verður í leiðbyggiaetlanini stórur dentur lagdur á, at skipanir og útbúnaður verða gjørd soleiðis, at tey tøkniliga sæð kunnu verða burturbeind.

Møguleikarnir, sum nevndir eru í stk. 2, loyva Føroyum at halda tær altjóða skyldur og leiðreglur, sum eru í gildi, eitt nú IMO-samtyktina frá 19. oktober 1989, sum setur upp leiðreglur um, hvussu havstøðir verða beindar burtur av landgrunninum. Gjøllari frágreiðing um altjóða reglur um hesi viðurskifti eru at finna í fylgiskjali 5.1-1 til kapittul 5.1 um *Fiskirinum og aling* í frágreiðingini frá Oljuráðleggingarnevndini.

Møguleikarnir eru í lógarregluni orðaðir á tílíkan hátt, at teir eisini í framtíðini mugu haldast at fara at vera í samsvar við altjóða rætt. Verða Føroyar partur í altjóða sáttmálum, sum avmarka møguleikarnar, verður eisini møguligt at lúka hesar skyldur innan karmarnar um § 20.

Eftir stk. 2, 2. pkt. skal loyvishavin beina alt burtur innan fyri freist, sum landsstýrið ásetir og sambært teimum krøvutm, sum landsstýrið hevur sett til góðkenning av avriggingaraetlanini. Til dømis kann hugsast, at treytir verða settar utn, at støðin skal verða avriggað á umhvørvisliga og trygdarliga forsvarligan háttt. Viðvíkjandi freistum til avrigging eigur loyvishavin at fáa eitt ávíst rásarúm, serliga tá ræður um burturbeining. Síðsta pkt. í stk. 2 viðgerð tey føri, har avriggingaraetlanin samsvarandi freistunum í stk. 3 er góðkend áðrenn framleiðslan er hildin uppat. Í tílíkum førum góðkennir landsstýrið avriggingaraetlanina undir teirri fortreyt, at hon verður fullførd innan ávísa freist frá tí at framleiðslan helt uppat og verður tí álagt loyvishavanum at boða landsstýrinum frá, tá hildið verður uppat.

Stk 3, 1. pkt. ásetir freist loyvishavans at senda landsstýrinum avriggingaraetlanina. Freistin er í seinasta lagi tvey ár innan at roknað verður við, at hildið verður uppat at brúka havstøðina. Tað kann vera torfør at áseta neyva tíð fyri, nær hildið verður uppat at brúka eina havstøð, men hugsað verður um. hvørjar aetlanir loyvishavin hevur. At aetlanin verður send landsstýrinum tvey ár innan hildið verður uppat at brúka havstøðina, skuldi gjørt tað møguligt hjá myndugleikunum at viðgjørt avriggingaraetlanina forsvarliga.

Er loyvi eftir §§ 6 ella 18 úti. áðrenn roknað verður við at halda uppat, skal loyvishavin eftir stk. 3, 2. pkt. senda avriggingaraetlanina inn í seinasta lagi tvey ár áðrenn loyvisskeiðið er runnið.

Sambært stk. 3 síðsta punktum kann landsstýrið krevja at fáa avriggingaraetlanina fyrr, skuldi hetta verið neyðugt, eitt nú um framleiðslan í roynd og veru er steðgað, uttan at loyvishavin hevur boðað landsstýrinum frá hesum. Tað verður eisini hildið at verða skilagott at loyva landsstýrinum at krevja prógv um ella trygd fyri fíggjarligu evnum loyvishavans at rigga støðina av, um grundir kunnu vera at halda, at loyvishavin er fíggjarliga veikur.

§ 21. Tá skeiðið í loyvi eftir §§ 6 ella 18 er runnið, loyvið latið innaftur ella tikið aftur, hevur tað almenna rætt til uttan viðurgjald at yvirtaka viðkomandi útbúnað. Sama er galdandi tá hildið er endaliga uppat at brúka útbúnað, ið burturav er aetlaður til brúks á ávísa økinum.
Stk. 2. Rættur hins almenna eftir stk. 1 verður útintur av landsstýrinum. Avgerðin verður boðað loyvishavanum í sambandi við at landsstýrið tekur støðu til avriggingaraetlan hansara eftir § 20 og hevur í seinasta lagi gildi tá 6 mánaðir eru farnir frá tíðini eftir stk. 1.
Stk. 3. Loyvishavin skal síggja til at búnaðurin við útgerð og neyðugum tilhoyri og tilfari verður avhendur tí almenna í forsvarliga viðlíkahildnum standi og leysur av møguligum skuldbindingum og øllum triðjamansrættindum. Tílíkar skuldbindingar og tílík rættindi deita burtur mótvegis tí almenna.

Viðmerkingar
Reglan gevur landinum rætt til í ávísum førum at yvirtaka ávísan útbúnað kostnaðarleyst. Talan er ikki um, at hann av sær sjálvum fellir til landið, men um rætt, sum landsstýrið kann brúka, um hetta verður hildið at vera rímiligt í ávísum førum.

Stk. 1 ásetir landsins yvirtøkurætt. Rætturin kann verða brúktur, tá ið skeiðið í loyvi til framleiðslu eftir § 6 ella rørleiðingarloyvi eftir § 18 er runnið, loyvið latið innaftur ella tikið aftur, ella tá ið virksemið er endaliga steðgað.

Meðan § 20 bert er galdandi fyri havstøðir, er yvirtøkuraetturin eftir § 21 galdandi bæði fyri havstøðir og útbúnað á landi. Harafturímóti er tað týdningarmikið at hugsa um, at einans virki, ið ætlað eru til brúks á ávisum øki, kunnu verða yvirtikin. Tá ræður um havstøðir merkir hetta, at tað almenna helst fer at kunna yvirtaka fastan útbúnað og innrættingar í § 2. litra b) ii), meðan flytandi eindir sum bori- og framleiðsluskip, ið eru bygd til brúks á fleiri leiðum, ikki koma undir regluna um yvirtøku. Í ávísum førum kann tað vera torført at taka dagar ímillum fastan útbúnað og innraetingar øðrumegin og flytandi eindir hinumegin. Summi slóg av útbúnaði sum, meðan framleitt verður, mugu haldast at vera fastur útbúnaður, kunnu í roynd og veru takast burtur og flytast. Orðini "burturav aetlaður til brúks í ávísa økinum" hava til endamáls at draga fram, at tá

hugsað verður um at bróka yvirtøkurættin má dentur leggjast á, um útbúnaðurin varð bygdur við tí endamálið at verða brúktur á meiri enn einari leið og um útbúnaðurin er innrættaður á tílíkan hátt, at flyting og framhaldandi brúk til oljuvirksemi er bæði tekniliga og fíggjarliga samumfkt, t.e. at flyting av einari leið á aðra hert fer at krevja smávegis tillaðingar av útbúnaðinum.

Bortreiði v.m., ið brúkt verða í leitingarskeiðnum, hava júst tað eyðkennni, at tey eru ætlað at verða brúkt aflastaðir og fella tí uttanfyri regluna.

Í flestu førum kann roknast við, at útbúnaður á landi er soleiðis dánaður, at hann bert verður brúktur á staðnum, og skuldi tí ikki staðist trupulleikar av reglini, tá ræður um tílíkan útbúnað.

Gjørt verður greitt í **stk. 2,** 1. pkt., at tað er landsstýrið, ið umsitur landsins rættindi til yvirtøku av útbúnað eftir stk. 1. Eftir 2. pkt. skal avgerð landsstýrisins um yvirtøku boðast loyvishavanum, tá landsstýrið tekur støðu til avriggingarætlanina eftir § 20. Av tí at § 20 sum nevnt bert er galdandi fyri havstøðir, verða avriggingartreytirnar settar í møguligt loyvi til útbúnað á landi, soleiðis sum nevnt er í viðmerkingunum til § 20. Viðvíkjandi útbúnaði á landi verður støða landsstýrisins til yvirtøku tí fráboðað í sambandi við viðgerðina av avriggingarætlanini, ið nevnd er í loyvinum. Yvirtøkurættur landsins hevur gildi 6 mánaðir eftir, at loyvisskeiðið er runnið, loyvið latið innaftur, aftantikið ella virksemið er endaliga bildið uppat eftir stk. 1.

Samboen **stk. 3,** 1. pkt. hevur loyvishavin skyldu at síggja til, at útbúnaðurin við tilhoyrandi útgerð er í góðum og forsvarligum viðlíkahildnum standi. tá landið yvirtekur hann. Haraftrat liggur á loyvishavanum, at útbúnaðurin er leysur av møguligum skuldbindingum og triðjamannsrættindum. Eftir 2. pkt. detta bæði skuldbindingar og triðjamannsrættindi burtur mótvegis tí almenna. Tað er tí skilagott av loyvishava og sáttmálapørtum hansara at hava reglurnar í huga og hera so í bandi, at møguligar skyldur, sum við er veitt fyri, eru loknar, áðrenn loyvisskeiðið er runnið.

§ 22. Loyvi ella góðkenningar eftir §§ 14, 18, 19 ella 20 viðvíkjandi verkætlanum, ið avlandi fara at ávirka umhvørvið munandi, kunnu bert verða veitt eftir at mett er um umhvørvisligu avleiðingarnar, og eftir at avvarandi almenningur, myndugleikar og felagsskapir hava fingið høvi at siga sína hugsan.
Stk. 2. Landsstýrið kann veita undantak frá kravinum eftir stk. 1, tala umstøðurnar fyri tí.
Stk. 3. Landsstýrið kann áseta reglur um, at avvarðandi almenningur, myndugleikar og felagsskapir skulu fáa boð og verða hoyrdir.

Viðmerkingar
Reglan svarar í høvuðsheitum til 28 a. í donsku undirgrundarlógini, sum heimilar Danmark at seta í gildi ES direktiv 85/337/EØF frá 27. juni 1985 um meting av ávirkanini á umhvørvi av ávisum almennum og privatum verkætlanum (VVM-direktivið), soleiðis at direktivið nú eisini verður at galda fyri verkætlantir til havs, sum koma undir undirgrundarlógina.

Umframt tey umhvørvisfyrilit, nevnd eru í hesi reglini, er ásett aðrastaðir í lógini, at alt virksemið sambært lógini skal verða lagt til rættis við neyðugum fyriliti fyri eitt nú fiskiskapi og umhvørvisáhugamálum, smb. endamálsorðingina § 1, stk. 2. Haraftrat skal landsstýrið í sambandi við útbjóðingarumfarini leggja eina frágreiðing fyri løgtingið, smb. § 7, stk. 2. Í frágreiðingini skal m.a. vera ein meting um avleiðingarnar av oljuvirksemi fyri fiskivinnuna og náttúru- og umhvørvisáhugamál. Haraftrat skal loyvishavin í sambandi við stovnan av havstøðum v.m. arbeiða samsvarandi einari leiðbeiggiætlan, ið er góðkend av landsstýrinum, smb. § 14, stk. 2. Ætlanin skal m.a. hava upplýsingar og metingar av árinnunum á umhvørvið og fiskivinnuna, smb. § 14, stk. 3. Sama er galdandi fyri avriggingarætlanina, smb. § 20.

Stk. 1 tryggjar, at metingar verða gjørdar um fylgjurnar fyri umhvørvið, áðrenn loyvi ella góðkenningar verða veitt til leiðbyggingar, legging av rørleiðingum ella avrigging av leiðum, um so er at niðurstaðan av einari ítøkiligari meting av umsóknini verður tann, at verkætlanin munandi ávirkar umhvørvið, hetundir dýr

og fisk í einum øki, og at tað er neyðugt at gera serstakar fylgjumetingar eitt nú fyri at útvega upplýsingar, ið ikki eru at finna í upprunaligu umsóknini.

Henda regla er ikki galdandi fyri forkannингar sum seismiskar upptøkur v.m., av tí at tílíkar kannингar bert hava smávegis ávirkan á umhvørvið. Tey tiltøk, sum kundu gjørst neyðug orsakað av seismikki og øðrum forkannингum kunnu setast í verk gjøgnum treytir í forkannингarloyvunum, smb. § 5. Leitiboringar koma undir regluna, men fara kortini ikki vanliga at krevja umhvørvisfylgjumeting, av tí at tílíkar boringar ikki fara at hava munandi ávirkan á umhvørvi. Tala serlig viðurskifti fyri tí, kunnu tílíkar metingar tó verða kravdar, áðrenn leitiboringar byrja.

Í ávísan mun verða metingarnar grundaðar á vitan, ið longu er til taks, men haraftrat má roknast við at grundleggjandi kannингar verða gjørdar av avvarðandi økjum, og ganga oljufeløg ofta saman um tílíkar kannингar í nýggjum oljuøkjum.

Sambært **stk. 2** fær landsstýrið heimild at veita undantak frá kravinum í stk. 1 eftir ítøkiliga meting í hvørjum einstøkum føri. Fráviksloyvi verða ætlandi bert givin í teimum førum, har tøk vitan, herundir fyrr gjørdar kannингar, er nóg mikil, ella har upplýsingarnar í umsóknunum um loyvi ella góðkenningar eftir §§ 14, 18, 19 og 20 mugu haldast at vera nóg góðar.

Stk. 3 heimilar landsstýrinum at áseta reglur um, hvørjir tryndlugleikar, felagsskapir ella avvarðandi almenningur eigu at fáa boð og verða hoyrd við viðgerð av umhvørvisfylgjumeting.

§ 23. Loyvishavin, fyristøðufelagið, stjórin á havstøðini, arbeiðstakarar, undirarbeiðstakarar og aðrir arbeiðsgevarar skulu, hvør í sínum lagi, síggja til at arbeiðsumstøðurnar eru fult forsvarligar til trygd og heilsu, og at dygt eftirlit er við at arbeiðið verður gjørt forsvarliga.

Viðmerkingar

Í reglunni verður tann vanligi trygdar- og heilsustandarin ("fult forsvarligt"), ið eigur at verða upphildin í sambandi við leitingar- og framleiðsluvirksemið, lýstur. Hesin standari verður grundarlagið undir teimum forskriftum, ið ætlandi verða gjørdar við heimild í § 24. § 23 er galdandi fyri allar partar av virkseminum, herundir eisini arbeiði og virksemi, sum gjøllari forskriftir ikki eru gjørdar um.

Annars verður víst til viðmerkingarnar til § 13, har undirstrikað varð, at tað er hann, ið stendur fyri virksemiunum (loyvishavin), sum hevur ábyrgdina av at skorna, varðveita og úthyggja eitt fult forsvarligt trygdarstig. Høvuðsábyrgdin er sostatt hjá loyvishavanum, vanliga umboðaður av fyristøðufelagnum, men eftir umstøðunum kunna stjórin á eini havstøð, arbeiðstakarar, undirarbeiðstakarar ella aðrir arbeiðsgevarar koma undir sjálvstøðuga ábyrgd, smb. orðini "hvør í sínum lagi".

Danska lógin um havstøðir hevur eisini tilsvarandi krøv um, at virksemið skal vera forsvarligt og undir dyggum eftirliti, tá tað snýr seg um kolvetnisvirksemi til havs. Sama er galdandi fyri donsku lógina um arbeiðsumhvørvi, smb. §§ 15 og 16. Í lógaruppskotinum eru reglurnar strangari enn tær í løgtingslóg nr. 58 frá 24. mai 1974 um arbeiðaravernd, sum nýtir heitini "nóg væl vardir" og "gjølla eftirlit", smb. § 5.

Samanbært seinasta petti í lógarreglunni er skylda at hava eftirlit við arbeiðsháttunum hjá øllum starvssettum og at arbeiðsgongdin í aðrar mátar er forsvarlig, eitt nú eigur eftirlit at verða havt við at arbeiðsforskriftir verða yvirhitdnar og at møguligir skeivleikar í forskriftunum verða rættaðir soleiðis.

Brot móti reglini kann verða revsað við hefti ella bót, shr. § 43, nr. 3.

§ 24. Landsstýrið kann, til tess at varða um trygdar-, heilsu- og umhvørvisatlit í sambandi við kolvetnisleiting, -framleiðslu og/ella -flutning, áseta nærri reglur fyri havstøðir, herundir reglur um:

a) vanligar skyldur hjá arbeiðsgevarum, formonnum, arbeiðstakarum og útvegarum v.m.,
b) skjalfesting viðvíkjandi heilsu- og trygdarviðurskiftum, eftirlitsskipanir, ið kunnu vera innaneftirlits- ella aðrar líkar skipanir, prógvskjalaskipanir og trygdarbygnað annars,
c) gerð av virkjum og útgerð, góðkenning og loyvi til byggifyrireiking, bygging, innleggingar, bók og burturbeining,
d) trygdar-, heilsu- og umhvørvisviðurskifti, arbeiti verður undir,
e) útbúgving og upplæring, hvíldartíð, frítíð, aldurskrav og heilsukanningar.

Viðmerkingar

Henda reglan veitir landsstýrinum heimild til at áseta gjøllari reglur fyri virksemi, ið hevur serligan týdning fyri trygd, heilsu, umhvørvi og arbeiðsumhvørvi, tá ræður um leiti-, framleiðslu- og flutningsvirksemi. Roknað verður við, at gjørdar verða reglur um boriútgerð, framleiðslu- og viðgerðarútbúnað, merking av útbúnaði, vistarhaldsrúm, kranar, fólka- og farmaflutning, lasting, brunaverju og eldsløkking, bjargingarútgerð, ravmagnsskipanir og -útgerð, umframt hori- og framleiðsluarbeiði, arbeiðstrygd og heilsuviðurskifti, trygdarbygnað o.a.

Nakrar lógir eru longu um trygdarviðurskifti, eitt nú løgtingslóg nr. 58 frá 24. mai 1974 um arbeiðaravernd, løgtingslóg nr. 78 frá 12. juni 1986 um eldsbruna o.a., og lóg nr. 98 frá 12. marts 1980 um skipatrygd v.m. Henda lóggáva er kortini ikki ordað við atliti til tey serligu viðurskifti, sum eru galdandi í leitingar- og framleiðsluvirksemi til havs. Í viðmerkingunum til § 2 litra b) varð sagt, at tørvurin á álítandi fyriskiping, eftirliti og samskiping er stórur í frálandsvinnuni tá ræður um trygd, heilsu og umhvørvi, og er tað tí ynskiligt, at hesi viðurskifti í mestan mun verða savnað í eina lóggávu. Haraftrat varð ment lagdur á í viðmerkingunum til § 3, at reglurnar í kap. 5 um trygd v.m. koma ístaðin fyri omanfyri nevndu lóggávu um arbeiðaravernd, brunaviðurskifti v.m. Hetta er kortini ikki til hindurs fyri, og tá serliga í eini byrjanartíð, at ein kunngerð lýst sambært § 24 vísir til hesa lóggávuna og á tann hátt letur ávísar reglur í hesi lóggávu fáa gildi í frálandsvinnu.

Viðmerkjast skal, at lógargreinin heimilar, at fyriskipanir verða gjørdar um onnur viðurskifti enn tey í litra a) — e) nevndu, um endamálið við fyriskipanini er at varða um trygd, heilsu og umhvørvi í leiting eftir, framleiðslu og flutningi av kolvetnum. Dømini nevnd í litra a) — e) mugur tó metast at vera kjarnin í teimum viðurskiftum, ið fyriskipanir fara at verða gjørdar um, hvat viðvíkir trygd v.m. Av tí at frálandsvirksemið er undir ógvusligari tøkniligari menning, hevur tað verið hildið skynsamari at geva landsstýrinum heimild at dagføra hesi viðurskifti í kunngerðum, heldur enn at fara í smálutir um trygdarviðurskifti í sjálvari lógini. Kunngerðirnar kunnu verða dagførdar eftir tøkniligu menningini og eftir tí millum- ella altjóða samstarvi um trygdarviðurskifti millum olju- og gassmyndugleikarnar, samstarvinum í ST sjóvinnufelagsskapinum IMO (International Maritime Organisation) o.a.

Roknað má verða við, at tær reglur, ið verða lýstar við heimild í § 24 í stóran mun verða ordaðar samsvarandi altjóða samtyktum. Hetta ger seg ikki minst galdandi í sambandi við gerð av útbúnaði v.m., eitt nú í førum tá flytandi boripallar stundum arbeiða á einum landgrunni, stundum á øðrum. Trygdarkrøvini, ið sett verða til boripallar, eiga tí at vera tílíkrigá lík frá landi til land. Tað er tí, at IMO í eini samtykt frá 1989 heitir á limalondini, um at brúka sokallaða MODU-standaran, ið fyriskrivar reglur um hygging av og útgerð á "Mobile Offshore Drilling Units". Verður standarin brúktur ella verður víst til hansara fer tað at lætta mutandi um umsitingina.

§§ 13 og 23 byggja á tann grundregla, at tað er hann, ið stendur fyri virksemtinum (loyvishavin), sum hevur ábyrgdina av, at virksemið er fult forsvarligt í øllum lutum og samsvarandi teimum krøvum lógin setir ella teimum krøvum, ið landsstýrið hevur sett í trygdarforskriftum. Eftir nútíðarfatan áleggur henda grundregla eisini loyvishavanum skyldu at seta í verk eina góðskutryggingarskipan (innaneftirlit), sjálvt um landsstýrið ikki skuldi havt brúkt heimildina í § 24, litra b) um innaneftirlit. Eitt krav til loyvishavan um prógv fyrí, at ein tílík skipan er sett í verk, eitt nú í sambandi við eina leitiboring, kann tí verða sett við beinleiðis heimild í lógini.

Innaneftirlit loyvishavans eigur at vera fyrireikað og sett í verk sum ein eftirlits- og skjalfestingarskipan fyri leitingar- og framleiðsluvirksemi, ið tryggjar tey starvssettu, umhvørvi, útbúnað v.m. Ábyrgdarviðurskifti, reglur um frágreiðingar, rakstrar- og eftirlitsgongdir eiga at verða skjalfestar og endurskoðaðar regluliga. Innaneftirlitsskipanir loyvishavans eiga eisini at fevna um innaneftirlitsskipanirnar hjá øðrum, ið taka lut í virkseminum, t.e. urbeiðstakarar, undirarbeiðstakarar, reiðarar v.m. Vanliga verður tað latið upp í hendurnar á loyvishavanum og øðrum, ið luttaka í arbeiðnum, at gera av, hvussu innaneftirlitsskipanirnar verða uppbygdar. Landsstýrið kann kortini sum ein partur av eftirlitinum krevja, at broytingar verða gjørdar, um tað verður hildið neyðugt.

Víst verður annars til viðmerkingarnar til § 13, har sagt varð, at trygdarkunngerðir, lýstar sambært lógini, og myndugleikaeftirlitið og útinning einans skulu metast sum ískoyti og vegleiðing til uppfylling av endamáli lógarinnar um forsvarligt virksemi.

§ 25. Á mannaðum havstøðum skal eigarin ella brúkarin tilnevna stjóra, ið hevur hægsta myndugleika á støðini í øllum lutum.

Stk. 2. Eigari ella brúkari av havstøð skal gera manningar- og verkskipan, ið sigur hvør stjórin er, hvørjir hava ábyrgdina av teimum ymisku høvuðssetningunum í rakstrartrygdini og ásetir leiðbeinandi reglur fyri samstarvi teirra, ið ábyrgdina hava.

Stk. 3. Landsstýrið kann, til tess at vissa sær at trygdin er í lagi, krevja at fáa ta í stk. 2 nevndu ætlan til góðkenningar og áseta gjøllari manningarreglur.

Viðmerkingar

Reglan í **stk. 1** skal gera greitt, hvør til hvørja tíð hevur ovasta myndugleikan á útbúnaðinum, tá arbeitt verður sum havstøð. Fyristøðufelagið eigur tí at tilskila, hvør hevur ábyrgdina til hvørja tíð í teirri verkskipan, hann gera samsvarandi stk. 2.

Tann í **stk. 2** nevnda manningar- og verksskipan skal fevna um alt virksemið á støðini, ið skal verða viðgjørd sum ein heild, ið fevnir um eitt nú íbúðarpall/ skip til fólkið, viðgerðarpallur, tangar v.m., ið eru knýtt at boripallinum ella boriskipinum. Sambært lógarreglunt verður kravt, at manningar- og verkskipanin skal fevna um teir, ið ábyrgd hava fyri einstøku høvuðssetningunum, tá umræður tryggum rakstri av útbúnaðinum. Neyvan er tørvur á einum fullfiggjaðum manningarlista yvir alla mannitgina. Hinvegin verður neyðugt í sambandi við góðkenning av manningar- og verkskipan eftir stk. 3 ella í reglum lýstum sambært § 24 av trygdarávum at seta krøv um tann førleika, ið teir, sum ábyrgdina hava av teimum einstøku høvuðssetningunum, mugu hava, eitt nú til manning av samskiftisútgerð, tyrludekki, bruna- og eyðflytingarútgerð v.m. Í hesum sambandi kann harumframt tørvur vera á at seta krøv um, hvussu nógv skulu arbeiða við teimum ymisku høvuðssetningunum og ávís krøv um úthúgving.

Sambært **stk. 3** kann landsstýrið krevja, at tann í stk. 2 nevnda skipan skal góðkennast. Góðkenningarmannagongdin verður kortini valla umfatandi, er manningar- og verkskipanin gjørd samsvarandi teimum vanligu reglunum, sum landsstýrið kundi hevt gjørt sambært § 24. Inntil tílíkar vanligar reglur eru gjørdar, mugu bæði verkskipanin og manningarreglurnar verða góðkendar í hvørjum føri sær.

§ 26. Eigari ella brúkari av havstøð skal halda dygga tilbúgving til verju fyri vantukku ella vanda, ið kunnu valda fólkaskaða ella deyða, umhvørvisdálking ella tingskaða. Fisini skal hann síggja til, at neyðug útgerð til eyðflytingar og bjargingar umframt ávaringar og fjarskifti er til taks. Hann skal í tílíkum førum skipa fyri neyðugum atgerðum at forða ella minka um fólkavanda og skaðafylgjur.

Stk. 2. Landsstýrið kann taka avgerð um ella áseta nærri reglur um tilbúgvingina, berandi um manning og útgerð, sum eigarin ella brúkarin skal hava til taks, hendir óhapp á støðini og um at fleiri loyvishavar skulu samstarva um tilbúgving. Í vantukku- ella vandastøðu kann landsstýrið taka avgerð um at seta í verk bjargingartiltøk ella atgerðir at vinna á vantukkuni og um, at aðrir skulu koma við neyðugari tilbúgvingarútgerð fyri eigarans ella brúkarans rokning.

Viðmerkingar
Samhært stk. 1 hevur loyvishavin, smb. orðini "eigari ella brúkari av havstøði", skyldu at halda dygga tilbúgving, meðan stk. 2 heimilar landsstýrinum at seta ávís krov til tilbúgvingina. Tilbúgvingin hjá loyvishavanum eigur at verða skipað á ein tílíkan hátt, at hon kann verða samskipað við landstilbúgvingina.

Stk. 1 áleggur loyvishavanum skyldu at stovna, varðveita og menna dygga tilbúgving at tryggja eitt forsvarligt trygdarstig fyri fólk, umhvørvi og virði. Í hesum sambandi skal loyvishavin siggja til, at neyðturvilig eyðfløtingar- og bjargingarútgerð er til taks, umframt hóskandi ávaringar- og samskiftiskervi. Samhært stk. 1, 2. pkt. hevur loyvishavin harumframt skyldu at seta í verk neyðug tiltøk at forða ella minka um fólkavanda og skaðafylgjur. Í hesum liggur m.a. skylda at eyðfløtta manningina av havstøðini, er hetta neyðugt av trygdarávum. Hann hevur eisini skyldu at taka upp eftir oljuleka, ið hevur dálkað sjógv ella strond ella hótt við tílíkari dálking. Í skylduni at seta neyðug tiltøk í verk liggur eisini, at viðkomandi tilbúgvingarmyndugleikar verða boðsendir beinanvegin, hendir stórri óhapp, og skylda at kunna myndugleikarnar reglufliga og geva upplýsingar, tá biðið verður um tað, smb. § 32.

Tilbúgvingarskipanin hjá loyvishavanum eigur at vera soleiðis háttað og útgjørd, at gingið kann verða dyggiliga fmóti vandu- og vanlukkuhendingum, ið kunnu volda manndeyða, fólkaskaða, dálking ella munandi tingsskaða.

Stk. 2 heimilar landsstýrinum at taka avgerð um ella áseta gjøllari reglur um stovnan og varðveiting av eini tilbúgvingarskipan við neyðugari útgerð og manning.

Soleingi gjøllari reglur ikki eru ásettar, má roknað verða við, at krøvini til tilbúgvingarskipanina verða sett í einari tilbúgvingaretlan, ið loyvishavin letur gera at leggja fyri myndugleikarnar til góðkenningar, eitt nú tá søkt verður um burigiðkenning. Í hesum sambandi fer at bera til at seta ítøkiligar treytir til tilbúgvingaretlanina, eitt nú um at bjargingar- og basingarútgerð skal vera tøk á staðnum ella at hendur skal fáast á henni innan ávísa tíðarfreist. Landsstýrið kann krevja, at fleiri loyvishavar samstarva um tilbúgving. Tílík samstarv er vanligt í okkara grannalondum og hevur fyrimunir til pening og útgerð, eitt nú tá olja og/ella gass koypir útann ("blow out").

Harumframt kann landsstýrið í bráðkomnari vanlukku- ella vandastoðu gera av, hvørji bjargingar- ella basingartiltøk loyvishavin skal seta í verk at basa vandamum, avmarka og basa vanlukkuni og bøta um fylgjurnar. Her verður hugsað um hendingar sum eldsbruni, spreinging, herverk, útann oljulop, og sum í sjónum eru serliga hættisligar fyri mannalív, álvarsliga umhvørvisdálking og sera stóran fíggjarmiss fyri bæði havstøðina sjálva og samfelagið alt.

Tað verður tí hildið neyðugt, at landsstýrið kann gera av, hvørji tiltøk loyvishavin skal seta í verk, ger hann tað ikki av sínum eintingum.

Elva avgerðir landsstýrisins eftir hesi lógarregla til krøv frá triðjamanni móti loyvishavanum fyri skaðar samhært § 34, kann alfursóknarkrav verða sett móti landsstýrinum, um vanligu endurgjaldstreytirnar eru loknar, eitt nú um mannagongdin hevur verið óforsvarlig.

Umframt heimildir landsstýrisins at gera av, hvørji tiltøk loyvishavin skal seta í verk í ávísari vandastoðu, má roknast við, at tað eisini verður neyðugt við samskipaðum avviki frá myndugleikunum, henda stórri vanlukkur. Ein tílík samskipan av bjargingar- og basingartiltøkum myndugleikanna kann tryggjast við at landsstýrið uttan beinleiðis lógarheimild setir eina aktiónsnevnd til samskipingar. Gjørligt verður gjøgnum nevndina at tryggja at ymisku uppgávurnar verða raðfestar og nerri fastlagdar eftir sum óhappið krevur tað. Í Noreg og Danmark hava aktiónsnevndirnar ongan sjálvstøðugan myndugleika, men roknað má verða við, at nevndarlimirnir hvør í sínum lagi hava myndugleika.

At enda kann landsstýrið gera av, at aðrir koma við neyðugari tilbúgvingarútgerð fyri eigarans ella brúkarans (loyvishavans) rokring. Fortreytin er, at vanlukku- ella vandastøðan er bráðkomin, á sama hátt sum tá landsstýrið ger av, hvørji bjargingar- ella basingartiltøk loyvishavin skal seta í verk. "Aðrir" merkir her aðrir loyvishavar og einhvør, ið hevur útgerð, sum kann brúkast í eini vandastøðu. Henda heimild eigur tó bert at verða brúkt móti øðrum enn loyvishavum um tað er alneyðugt. Tann, ið fær álagt at koma við úgerð, hevur krav um endurgjald.

§ 27. Rundan um havstøðir, tó ikki rørleiðingar, skulu vera trygdarøki. Landsstýrið ásetir víddina samsvarandi galdandi altjóða reglum og kann gera fyriskipanir um sigling, fiskiskap og flúgving á økjunum, herundir banna óviðkomandi skipum og floygførum at koma inn á økini.
Stk. 2. Landsstýrið kann av trygdargrundum áseta reglur um avmarkingar av uppankring og fiskiskapi við undirsjóvar rørleiðingar.

Viðmerkingar
Sambært **stk. 1,** 1. pkt. er tað skylda at hava trygdarøki rundan um havstøðir. Tað verður landsstýrið, ið tekur avgerð um trygdarøkini og í hesum sambandi, smb. 2. pkt., ásetur víddina á økinum samsvarandi altjóða reglum. Landsstýrið kann harafturat gera forskriftir fyri sigling, fiskiskapi og flúgving á økinum.

Neyðugt er við tílíkum økjum, av tí at pallar og onnur virki tola lítið av, verða tey ásigld, og vandin fyri manningini og kolvetnislekum er stórur, hendir vanlukka. Harafturat kemur, at nógv skip og hjálparfør vanliga eru í økinum um sjálva havstøðina í oljuørindum. Tað hevur tí stóran týdning fyri trygdina, at før, sum einki hava við virksemið at gera, halda seg burtur.

Altjóða rættur heimilar strandalondum at skipa trygdarøki rundan um havstøðir, smb. § 5(2) í landgrunnssáttmálanum, ið heimilar trygdarøki rundan um "installations and other devices", ið neyðugar eru til leiting og gagnnýting av undirsjóvar náttúrutilfeingi. Í § 60(4), smb. § 80, í havrættarsáttmálanum er samsvarandi heimild at skipa trygdarøki kring "artificial islands, installations and structures". Ósemja er millum serfrøðingar í altjóða rætti, um nakar veruligur munur er á hesum báðum orðingunum, men hóast hesa ósemju verður hildið, at tey kunna tulkast reiðiliga víðt, soleingi trygdarøkini eru sakliga grundað og ikki eru "unjustifiable interference" fyri sigling, fiskiskap v.m., smb. § 5(1) í landgrunnssáttmálanum. Tað er neyvan nakar ivi um, at havstøðir, smb. § 2, litra b), koma undir orðingarnar í báðum sáttmálunum.

Altjóða rættur áleggur skipum úr øllum londum at virða trygdarøkini, og heimilar strandalandinum at seta í verk tiltøk í økinum, sum neyðug eru at tryggja havstøðirnar.

Hvat víddini av trygdarøkjunum viðvíkjur áseta bæði landgrunnssáttmálin og havrættarsáttmálin størstu vídd til 500 metrar frá útsíðu at rokna. Havrættarsáttmálin lovar tó víðari trygdarøkjum, er hetta í samsvar við alment viðurkendar altjóða reglur ella viðmelt av viðkomandi altjóða felagsskapi (IMO). Havandi í huga tað sum henda kann á hesum øki, er tað skilabetri, at tað er landsstýrið, ið ásetir víddina av trygdarøkinum, heldur enn at størsta vídd verður ásett í lógini.

Landsstýrið kann í almennari fyriskipan, ið heimilar ítøkiligum undantøkum, áseta vídd á trygdarøkjum, reglur um fiskiskap, sigling og flúgving á økinum. Tá hetta er gjørt, er einans tørvur á at almannakunngerða positiónina á havstøðunum, sohvørt tær verða lagdar út. Kunngerðin eigur at verða gjørd hóskandi tíð frammanundan.

Um gildi av føroyskum rætti á trygdarøkinum verður vist til § 3, stk. 2 við viðmerkingum.

Stk. 2 heimilar landsstýrinum av trygdargrundum at avmarka rættin at ankra upp ella royna við undirsjóvarrørleiðingar.

Hildið verður ikki, at atljóða rættur heimilar standalandinum at skipa beinleiðis trygdarøki um rørleiðingar á sama hátt sum rundan um havstøðir, men hinvegin bindrar atljóða rættur ikki, at tiltøk verða sett í verk, sum eru neyðug av trygdarávum.

Avmarking ella møguligt bann máti fiskiskapi við undirsjóvarrørleiðingar verða vanliga hert at galda fyribils, meðan rørleiðingin verður løgd. Tá rørleiðingarnar eru lagdar, kann fiskiskapur í lesstu førum verði tikin uppaftur.

Annars verður vist til viðmerkingarnar til §§ 18 og 19.

§ 28. Er álvarslig vanlukka hend orsakað av virksemi, ið kemur undir hesa lóg, ella tilbandur, ið kundi elvt slíka vanlukku, ella munandi tingskaða, ella sjódálking, kann landsstýrið seta skaðanevnd at kanna og meta um hendingina og skriva frágreiðing. Landsstýrið kann ásetta nærri reglur um virksemi nevndarinnar.
Stk. 2. Skaðanevndin hevur loyvi at kanna havstøðina ella leivdirnar av henni.
Stk. 3. Skaðanevndin kann krevja, at bøkur og onnur skjøl, ið hava týdning fyri kanningina, verða framløgd, og kann avhoyra eigaran ella brúkaran av havstøðini, starvsfólk og hvørn tann, ið verður hildin at kunna koma við upplýsingum, ið hava týdning fyri kanningina.
Stk. 4. Skaðanevndin kann krevja avhoyring í rættinum sambært reglunum í rættargangslógini.

Viðmerkingar
Stk. 1 heimilar, at sett verður skaðanevnd, tá ið álvarsligar vanlukkur ella álvarsligur vandi hevur borist á av virksemi, lógin fatar um. Av orðingini skilst, at serliga verður hugsað um álvarsligar vandastøður og vanlukkur á havstøðum. Tað kemur sostatt neyvan fyri, at skaðanevnd verður sett í sambandi við vanliga arbeiðsvanlukku, hóast hon hevur kravt mannalív ella volt stóran manskaða. Roknað verður við, at løgreglan í samstarvi við trygdarmyndugleikarnar kannar arbeiðsvanlukkur, og endamálið við skaðanevndini er ikki at koma ístaðin fyri hetta kanningararbeiðið.

Meðan ein løgreglukanning vanliga miðar ímóti at uppklára møgulig revsiverd viðurskifti, verður uppgávan hjá skaðanevndini at avdúka, hví vanlukkan hendi. Haraftrat fer nevndin at kortleggja hendingarøðina, herundir atburð og avrik hjá loyvishavi, fyristøðufelagi, arbeiðstakarum o.ø. at hindra ella avmarka skaðan ella vandan. Haraftrat verður tað setningur nevndarinnar at meta um og siggja hesi viðurskifti í heild við almenna trygdaretlirlitið, regluskipanina, innaneftirlitsskipan loyvishavans v.m. og koma við uppskotum um møguligar ábøtur. Hinvegin tekur nevndin ikki støðu til møguliga revsiábyrgd.

Kanningarnar og niðurstøðurnar hjá skaðanevndini hava sostatt ikki bindandi prógvvirði og ákæruvald, dómsstólar, umsitingarvald o.ø., ið brúka frágreiðingina frá skaðanevndini, gera tað bert í tann mun, hon er sannførandi. Tað er sostatt bert talan um eina tøkniliga/sakkøna upplatan av eini hendingarøð.

Tað hevur ikki verið hildið at vera skilagott at koma við uppskoti um at seta fasta skaðanevnd sum er. Tær álvarsligu vanlukkur og vandastøður, sum talan kann verða um, eru av sera ymiskum slagi, eitt nú ótarnt oljulop, eldsbruni, sprenging, hyggibrek v.m. Neyðugur serkunnleiki at meta um viðurskiftini í sambandi við eina vanlukku ella vandastøðu, verður tí so ymiskur alt eftir slag og støddf av vanlukkunum. Sakkunnleiki um boritøkni, jarðfrøði, sigling og flúgving verður tó helst umboðaður.

Skotið verður upp, at landsstýrið fær heimild at ásetu gjøllari reglur fyri virksemi nevndarinnar.

Sambært **stk. 2 og 3** kann skaðanevndin gera neyðugar kanningar, eitt nú av einari havstøð, og skipa fyri avhoyringum av øllum sum mugu haldast at hava upplýsingar av týdningi fyri kanningina.

Stk. 4 loyvir nevndini at krevja avhoyringar í rættinum, av tí at tað verður hildið skilagott at nevndin kann fáa fólk avhoyrd innanrættar við vitnisábyrgd, smb. § 1018 í rættargangslógini, hóast óformligar avhoyringar í nevndini helst verður tað vanliga

§ 29. Landsstýrið kann áseta gjøllari reglur um virksemi sambært loyvum eftir §§ 4, 6, 18, 19 og 20.

Viðmerkingar
Tað verður hildið at vera skilagott at hava heimild at áseta gjøllari fyriskipanir um kolvetnisvirksemið eftir §§ 4, 6, 18, 19 og 20. Talan er her um eina reglu, sum kemur aftarat øðrum serligum heimildum at áseta gjøllari reglur, sum t.d. § 5, stk. 2, § 24 og § 29 er sostatt bert ætlað sum fiskoytisheimild til at áseta neyvari reglur um virksemi eftir lógini, t.d. reglur um talking av fyriskipanum og øðrum reglum, ið kunngjørdar eru sambært serligu heimildunum.

§ 30. Landsstýrið savnar allar tøkar upplýsingar um undirgrundina, ið fáast til vega í virksemi eftir hesi lóg.

Viðmerkingar
Endamálið við hesi regln er at tryggja, at allar upplýsingar um undirgrund Føroya, sum verða savnaðar í sambandi við virksemi eftir hesi lóg, smb. m.a. § 11, verða latnar landsstýrinum við tí í hyggju at røkja og framhaldandi byggja upp ein upplýsingarbanka um undirgrundina. Eftir at ávís freist er farin, kann almenningurin vanliga fáa atgongd til upplýsingarnar í bankanum. Freistin er vanliga 5 ár eftir at upplýsingarnar eru latnar inn.

§ 31. Landsstýrið hevur eftirlit við, at lógin og reglur og treytir settar sambært lógini verða hildnar.
Stk. 2. Landsstýrið kann áseta nærri reglur um eftirlit, góðkenning av stakroyndum og øðrum prógvum fyri, at reglur um trygd, heilsu og umhvørvi eru hildnar.
Stk. 3. Landsstýrið kann heimila lands- og øðrum almennum stovnum at umsita heimildir, ið lógin gevur landsstýrinum.
Stk. 4. Loyvishavarnir rinda útreiðslurnar av viðgerð myndugleikanna av málum um loyvi og góðkenning v.m. til virksemi eftir hesi lóg, og av eftirlitinum eftir stk. 1 sambært reglum, ásettum av landsstýrinum.

Viðmerkingar
Eftirlit er týðandi partur av landsstýrisins arbeiðssetningi í sambandi við hesa lóg og við reglur og treytir, gjørdar eru sambært lógini. Arbeiðið hjá eftirlitinum er at fylgja við virkseminum hjá loyvishavarnum og at síggja til, at bæði forkanningar, leiting og framleiðsla fara forsvarliga og skynsamiliga fram, smb. § 13, ikki mintst við atliti at trygd og arbeiðsumhvørvi. Harumframt skal verða ansað eftir, at loyvishavarnir halda treytir og ásetingar, settar eru í loyvunum.

At landsstýrið sambært **stk. 2** m.a. kann áseta reglur um góðkenning av stakroyndum og aðrari skjalfesting fyri, at fyriskipanir um trygd, heilsu og umhvørvi eru fylgdar, tryggjar at skjalfesting frá eitt nú klassafeløgum kann verða tikin við av eftirlitsmyndugleikunum í sambandi við viðgerð av umsóknum. Myndugleikarnir kunnu treyta góðkenning av, at nóg góð skjalfesting er útvegað av hesum feløgum til uppfylling av trygdarkrøvum.

Stk. 3 heimilar at lata øðrum almennum stovnum upp í hendur at standa fyri eftirlitinum.

Í stk. 4 verður staðfest, at loyvishavarnir skulu gjalda útreiðslur hjá tí almenna, ið standast av málsviðgerðini viðvíkjandi loyvum og góðkenningum, og fremjan av eftirlitinum. Hesar útreiðslurnar kunnu verða kravdar endurgoldnar í tann mun tær kunnu skuldskrivast hvørjum loyvishava sær.

§ 32. Loyvishavar, eigarar ella brúkarar av havstøðum skulu lata allar upplýsingar, landsstýrið heldur vera neyðugar til eftirlitið við virksemi teirra eftir hesi lóg.
Stk. 2. At fremja eftirlitið kann landsstýrið áleggja loyvishava at lata inn stakroyndir, rátthavi, viðgerðarúrslit, talkingar og metingar umframt tøkniligar og búskaparligar upplýsingar.
Stk. 3. Har tað er neyðugt til eftirlits, hava starvsfólk eftirlitsmyndugleikans til hvørja tíð, uttan dómsúrskurð móti neyðugum samleikaprógvi atgongd til allar partar av fyritøku, har virksemi er eftir hesi lóg.

Stk. 4. Tað liggur á eigara ella brúkara av havstøð eins og tettnum. ið virka teirra vegna, at geva starvsfólki eftirlitsmyndugleikans alla neyðuga hjálp í kanningarvirksemi teirra.
Stk. 5. Umboð fyri eftirlitsmyndugleikan hava rætt at taka lut sum eygleiðarar á fundum í samstarvsnevndum hjá loyvishavum, sum í felag hava fingið loyvi eftir § 6.

Viðmerkingar
Grein 32 tryggjar, at eftirlitsmyndugleikin í verki kann hava umsjón við, at lógin og treytir ásettar í sambært lógini verða hildnar.

Sambært **stk. 2** kann eftirlitsmyndugleikin geva boð um, hvørjar upplýsingar skulu latast inn, nær og til hvønn. Verða tílík boð ikki fylgd, kann revsing áleggjast sum bót ella hefti, smb. § 43, stk. 1, litra d.

Stk 3, sum er fískoyti til stk. 1. og 2, gevur eftirlitsmyndugleikanum atgongd til allar partar av fyritøkuni, har virksemi sambært hesi lóg gongur fyri seg, í tann mun tað er neyðugt til eftirlits, uttan at neyðugt er við dómsúrskurði. Endamálið er serliga at fáa atgongd til tann útbúnað, ið lógin fevnir um, at gera kanningar, har sum eftirlitið ikki kann verða framt bert við innsending av upplýsingum. Tað verður bert í undantaksførum neyðugt at krevja atgongd til umsitingarhøli o.l.

Stk. 4 ásetir á sama hátt sum § 13 stk. 4 í lóg um skipatrygd v.m., at eigari ella brúkari av havstøð umframt einhvør, ið virkar teirra vegna, hevur skyldu at geva starvsfólki eftirlitsmyndugleikans alla neyðuga hjálp í kanningarvirksemi teirra.

Endamálið við **stk. 5,** sum er eitt fískoyti til hinar reglurnar í § 32, er at tryggja alment innlit í leitingar- og framleiðsluvirksemið, umframt at fáa gott samband við loyvishavarnar. Við samstarvsnevndir verður m.a. hugsað um "joint operating committees" í samarbeiðsfeløgunum (joint ventures) hjá oljufeløgunum.

§ 33. Eftirlitsmyndugleikin kann geva boð um, at viðurskifti, ið eru ímóti lógini ella reglum og avgerðum sambært lógini, verða fingin í rættlag beinanvegin ella innan nærri ásetta freist.
Stk. 2. Metir eftirlitsmyndugleikin, at tað er neyðugt til tess at forða hóttandi stórvanda fyri starvsfólksins ella annara trygd ella heilsu ella fyri umhvørvisdálking, kann hann geva boð um, at beinanvegin skal verða gingið ímóti vandanum, herundir at arbeiðið verður steðgað.

Viðmerkingar
Eftirlitsmyndugleikin kann geva boð um, at viðurskifti, sum eru ímóti lógini ella ímóti reglum ella avgerðum sambært lógini, verða fingin í rættlag beinan vegin, ella innan nærri ásetta freist. Tá vandarnir við leitingar- og framleiðsluvirksemunum verða havdir í huga, hevur tað havt avgerandi týdning, at eftirlitsmyndugleikin í teimum førum, nevnd eru í stk. 2, kann steðga arbeiðinum heilt. Verða boðini frá eftirlitsmyndugleikanum ikki fylgd, kann revsing verða álagd sum bót ella hefti, smb. § 43, stk. 1, litra d.

Kapittul 7
Endurgjald og serligar reglur um skaðabøtur til fiskimenn

Viðmerkingar
Í hesum kapittli eru bæði vanligar reglur um endurgjald, har tann, ið skaðan gjørdi, skal rinda endurgjald um ábyrgdargrundarlag er, og reglur um skaðuhøtur eftir meting.

Sambært § 34 er partleys (objektiv) ábyrgd fyri skaðum, voldir í virksemi eftir loyvinum. Tað er møguligt at lækka endurgjaldið ella lata tað falla burtur, um hann, ið varð fyri skaða, medvirkaði tilíkið ella av grov um ósketni. Dálkingarskaðar eru, í teimum førum tá skaðavoldarin er kendur, eisini undir teirri strongu ábyrgdarregluni, men møguligt er at lækka endurgjaldið ella lata tað falla burtur. Tá talan er um *force majeure*,

Semjast skaðavoldari og tann skaddi ikki um endurgjaldið, verða mál eftir § 34 avgjørd av vanligu dómstólunum.

Royndir vísa, at kolvetnisvirksemi kann elva til ungulleikar fyri fiskiskap, uttan at tað her tí at finna tann, ið skaðan veldi. Hetta kemur serliga fyri, tá skip fáa lutir, ið stava frá kolvetnisvirksemi, í fiskireiðskapin. Tað verður tí skotið upp í § 35, at loyvishavarnir hava samábyrgd fyri skaðabótum fyrt tílíkan skaða á fiskireiðskap, fiskiskip umframt veiðimiss og mista fiskitíð. Tað er ein treyt fyri skaðabótum eftir hesi reglu, at tær upplýsingar, ið eru tíl taks tala fyri, at tapið stavar frá kolvetnisvirkseminum. Ein serlig skaðabótanevnd ásetir skaðabøtur eftir hesi reglu, smb. § 37.

Kolvetnisvirksemið kann, umframt beinleiðis skaðu og tap, verða fiskiskapinum til bága, av tí at roknast kann við, at leiðir, har vinnuligur fiskiskapur hevur verið rikin, fara at verða bróktar í oljuvirkseminum. Rætturin at reka fiskiskap er ikki vardur av vanligum endurgjaldsreglum í teimum førum, tá veiðumøguleikarnir á royndum leiðum verða skerdir. Tí verður skotið upp í § 36, at landsstýrið í sambandi við góðkenning av leiðbygging, legging av rørleiðing ella avrigging av oljuleið, *annaðhvørt* hevur tikið støðu til spurningin um skaðabøtur *ella* hevur sent skaðabótanevndini málið til avgerðar, smb. § 37. Tá støða verður tikin til mál eftir § 36 skal dentur verða lagdur á, um kolvetnistiltøkini eru til hindurs ella tarn fyri vinnuligan fiskiskap, har á leiðini, og um inntøkumøguleikarnir hjá fiskimonnum verða skerdir.

Grein 37 stgur, hvussu skaðabótanevndin verður vald og heimilar landsstýrinum at gera reglur um skaðabótagjald, útreiðslurnar av skaðabótanevndini og um málsviðgerðina. Tað eru loyvishavarnir, ið gjalda bæði skaðabøtur og nevndarútreiðslur.

§ 34. Loyvishavin skal endurgjalda tap, ið stendst av skaða, dálkingarskaði iroknaður, elvdur av virksemi sambært loyvinum, hóast skaðin stendst av tilvild.
Stk. 2. Hevur tann, ið varð fyri skaða, tilætlað ella av grovum ósketni, medvirkað til skaðan, kann endurgjaldið verða lækkað ella fella burtur.
Stk. 3. Endurgjald fyri dálkingarskaða kann verða lækkað ella fella burtur, verður tað prógvað, at náttúruhending, ið ikki slapst undan, krígs- ella yvirgangsatgerð ella líkar tvingandi umstøður (force majeure) munandi hava medvirkað til ella økt um skaðan undir umstøðum, ið ikki kundi roknast við fóru at henda, og sum loyvishavin ikki hevði ræði á.
Stk. 4. Við dálkingarskaða skilst í hesi lóg skaði ella tap orsakað av dálking, elvdari av kolvetnisfluymi ella -leka úr virki, borihol iroknað, og útreiðslur til rímilig tiltøk at forða ella avmarka tílíkan skaða ella tap, umframt skaða ella tap, ið standast av tílíkum tiltøkum. Skaði ella tap, sum eigarar, reiðarar og manning á fiskiskipum hava verið fyri orsakað av skerdum fiskimøguleikum, verða eisini mett at vera dálkingarskaði.

Viðmerkingar
Stk. 1 svarar til § 4, stk. 1 í forkanningarlógini, tó er skoytt uppí fyri at eingin ivi skal vera, at dálkingarskaðar, smb. stk. 4, koma undir reglana. Reglan ásetir á sama hátt sum gjørt varð í § 10 í undirgrundarlógini frá 1950, partleysa ábyrgd (objektiva) fyri skaðar voldir í virksemi eftir loyvum sambært lógini. Skotið verður upp, at ábyrgdin verður víðkað, soleiðis at ábyrgd bæði er fyri skaða voldum uttanfyri standandi fólki og annannans ogn og eisini fyri skaða á fólk, sum ikki kunnu metast at vera uttanfyri standandi (starvssett, sáttmálapartar o.fl.).

Loyvishavi kann ikki í avtalum við arbeiðstakarar, útvegarar o.fl. fráleggja sær ábyrgd sína sambært hesi reglu. Ábyrgdarreglan tryggjar tí, ið varð fyri skaða, soleiðis at hann kann halda seg til loyvishavan, eisini í førum har skaðin í royndini og veru er voldur av eitt nit einum undirarbeiðstakara. Tað fylgir við øðrum orðum av reglini, at loyvishavin, í teimum førum hann ikki sjálvur hevur volt skaðan, hevur samábyrgd við sínum sáttmálapørtum v.m. Reglan tekur himvegin ikki støðu til eina møguliga seinni aftursóknaruppgerð millum loyvishavan og veruligu skaðuvoldaran. Ein tílík uppgerð skal tí verða gjørd samsvarandi tí, sum avtalað er partanna millum og/ella vanligum endurgjaldsreglum.

Partleysa og ávarmarkaða ábyrgdin hjá loyvishavanum kann ikki avmarkast eftir reglunum í sjólógini um avmarking av ábyrgd í førum, har virksemið stavar frá flytandi virki, sum sjólógin er galdandi fyri, serliga tlótandi borireiðum.

Endurgjaldsábyrgd sambært § 34 er treytað av, at vanligar endurgjaldstreytir í aðrumátar eru loknar, sum t.d. kravið um at tann skaddi skal prógva, hvør gjørdi skaðan. Reglan er eisini galdandi fyri skaða á eitt nú fisktreiðskap og fiskiskip um so er, at viðkomandi hevur sannað, hvør skaðan gjørdi og prógva, at skaðin stóðst av virksemi eftir hesi lóg.

Stk. 2 svarar til § 4, stk. 2 í galdandi forkanningarlóg.

Sambært stk. 3 kann endurgjaldið fyri dálkingarskaða, smb. stk. 4, lækkast ella møguliga falla burtur, er talan um *force majeure*. Vanligar endurgjaldsreglur høvdu helst viðført, at endurgjaldið verður lækkað í tílíkum førum, men tá hugsað verður um, at talan er um partleysa ábyrgd og at dálkingarskaðar møguliga kunnu føra til stór endurgjaldskrøv, verður tað hildið best hóskandi við fyriliti fyri loyvishavanum, at tað fylgir av sjálvari lógini um kolvetnisvirksemi, at endurgjaldsábyrgdin kann lækkast, tá talan er um hendingar, sum nevndar eru í regluni.

Við "náttúruhending, ið ikki slapst undan" verður hugsað um eina hending ella handling, sum loyvishavin (fyristøðufelagið) als ikki hevði kunnað fyribyrgt ella avmarkað fylgjurnar av, ella sum tað ikki var væntandi, at hann hevði fyribyrgt ella avmarkað, sjálvt um hetta fyri so vítt hevði verið gjørligt. Í hesum sambandi mugu strong krøv setast til tilbúgvingartiltøk loyvishavans (fyristøðufelagsins).

Við krígi skilst eisini borgarakríggj, meðan yvirgangsatgerðir m.a. fevna um herverk og aðrar gerðir tilætlaðar at skaða loyvishavan og/ella fíthúnað hansara. Líkar tvingandi umstøður fevna um aðrar ófyribyrgjandi hendingar ella gerðir, ið kunnu javnmetast við frammanfyri nevndu.

Reglan í stk. 3 kann verða brúkt, sjálvt um force majeure hendingin bert var ein av fleiri medvirkandi grundum til skaðan ella støddina av skaðanum. Tað er tó ein fortreyt, at hendingin hevur havt týðandi ávirkan á, at skaðin hendi og at loyvishavin (fyristøðufelagið) ikki hevði ræði á hendingini.

Í **stk. 4** er gjøllari lýst, hvørjir dálkingarskaðar koma undir reglurna í stk. 1.

Dálkingarskaðar eru skaðar og tap, sum eftir vanligari hugsan um tað, ið roknast kann við, kunnu metast at vera fylgjur av floymi ella leka. Við virki skilst allur tann útbúnaður, ið nýttur verður í sambandi við framleiðslu av kolvetni, eitt nú havstøðir, smb. § 2, litra b), rørleiðingar, smb. § 18, og møguligur útbúnaður og virki á landi, smb. § 14, stk. 2. Sum reglan er orðað, koma borihol eisini undir hugtakið virki, og floymur beinleiðis úr boriholi, er tí eisini dálkingarskaði. Við boriholi skilst eisini brutnar, meðan teir verða boraðir. Við kolvetni skilst í reglunt tað sama sum í § 2 litra a), t.v.s. at leki av eitt nú ennum oljuútdrátti sum bunkringarolju úr boriskipi er ikki dálkingarskaði í lógarinnar merking, men vanligur skaði við partleysari ábyrgd eftir stk. 1. Av hesum fylgir, at stk. 3 um lækking ella burturfall av endurgjaldi í *force majeure* førum ikki er galdandi fyri tílíkan leka. Møguligur leki av eitt nú bunkringarolju ella borievnum koma sum nevnt undir ta vanligu partleysu ábyrgdina eftir stk. 1 (tann mun lekin er úr skipi ella palli levnd av skilmarkingini av havstøðum, smb. § 2, litra b). Avmarkingarreglurnar í sjólógini hava tí ikki týdning, meðan skipið ella pallurin verða brúkt til fyritakssemi, sum kemur undir hesa lóg.

Sermerktir dálkingarskaðar eru á dýra- og plantulív í sjógvi og á landi, umframt dálking av strond og fiskireiðskapi v.m. Vanliga er tað ein fortreyt, at skaðin ella tapið koma undir vanligar endurgjaldsreglur um samanhang millum gerð og fylgju, um hvat vanliga kann roknast við tadækvans) umframt at áhugamál hins skadda eru vard av endurgjaldsreglum. Lagt skal tó verða aftrat, at útreiðslur hjá tí almennu og øðrum (eitt nú privatum jarðeigarum) til reinsing av strondini koma undir reglurna sjálvt um strandareinsing ikki hevur

beinleiðis fíggjarligt virði. Verja av náttúruumhvørvinum og endurskapan av umhvørvinum eftir at skaði er hendur munar meira í tílíkum førum enn vanligar endurgjaldsrættarligar metingar um, hvat kann skiljast sum fíggjarligt tap.

Útreiðslur av tiltøkum til fyribyrging ella avmarking av einum dálkingarskaða verða endurgoldnar javnt við dálkingarskaðar. Tílíkar útreiðslur verða bert endurgoldnar í tann mun tiltøkini eru *rímilig*, t.e. at tey, sum stóðan var, við vanligum hygni máttu haldast at vera bóskandi at fyribyrgja ella avmarka skaðan ella tapið. Harafturat mugu útreiðslurnar av tiltøkunum standa í rímiligan mun til tey virði, sum aetlanin var at verja. Tað er ikki avgerandi um tiltøkini eydnaðust ella ikki. Tiltøk til tess at fyribyrgja ella avmarka dálking av fugli og tiltøk oljuplágaðum fugli til hjálpar koma eisini undir regluna.

Tap og skaðar, sum standast av omanfyri nevndu tiltøkum, koma eftir uppskotinum eisini undir regluna. T.d. er tað sostatt ikki eitt avgjørt krav, at skaðin ella tapið skal verða valt beinleiðis at kolvetnunum (olju ella gassi), men er tað nóg mikið, at skaðin er elvdur av evnum, ið verða brúkt at avmarka olju- ella gassdálking.

At enda verður ásett, at skaði ella tap, sum eigarar, reiðarar ella manning á fiskiskipum hava verið fyri orsakað av skerdum fiskimøguleikum eisini koma undir dálkingarskaða.

§ 35. Verða føroyskir eigarar, reiðarar og manning á fiskiførum fyri tapi, ið má metast at stava frá kolvetnisvirksemi til havs sambært hesi lóg, og ikki gerst av hvør skaðan voldi, smb. § 34, skulu loyvishavarnir við samábyrgd veita skaðabøtur fyri skaða á fiskireiðskap, -skip, og -før umframt veiðumiss og mista fiskitíð. Sama er galdandi fyri mista fiskitíð í sambandi við merking, upptøku og uppskiping av lutum, ið stava frá virkseminum. Loyvishavar kunnu stovna skaðabótagrunn við tí endamáli at gjalda krøv eftir hesi reglu, áðrenn farast kann eftir loyvishavunum.

Viðmerkingar
Í vissan mun kann kolvetnisvirksemi darva fiskivinnuni ella volda henni trupulleikar, hóast tað ikki er gjørligt at finna hann, ið skaðan gjørdi. Her verður hugsað um, at fiskiskip fáa lutir, sum eingin kenst við, í fiskireiðskapin, men tað kortini reiðiliga vist kann verða sagt, at luturin stavar frá kolvetnisvirksemi.

Hildið verður rímiligt, at lógin veitir møguleika at gjalda fyri slíkan miss, tó at tað ikki er gjørligt at halda seg til "skaðaelvaran". Grannalond okkara hava skipanir, sum miða ímóti at endurgjalda fiskimonnum fyri tap, sum við stórari vissu kann sigast at verða elvdur av kolvetnisvirksemi, tó at eingin veit, hvør ið skaðaelvarin er. Í Noregi eru reglurnar um skaðabøtur tiknar við í petroleumslógina, meðan viðurskiftini í Danmark og Noregi eru skipað í avtalum millum frálandsfelagini og fiskimannafelagini. Havandi týdningin, fiskiskapur hevur fyri Føroyar, í huga, verður tað hildið bóskandi, at hesar reglur koma við í kolvetnisvirksemislógina longu frá byrjan.

§ 35 er um vinnuligan fiskiskap. Rætt at fáa skaðabøtur eftir hesi reglu hava tí eigarar/reiðarar av føroyskt skrásettum fiskiførum, sum hava loyvi frá landsstýrinum at reka vinnuligan fiskiskap (fiskiloyvi), og manningarnar. Roknað verður við at skaðabøturnar fyri mista veiðu og fiskitíð verða býttar millum eigara/reiðara og manning sambært sáttmálum millum reiðarfelagið og manningarfelagini.

Av tí at § 35 ásetir, at skaðabøtur skulu veitast í førum, har skaðavoldarin sjálvur er ókendur, verður tað hildið at samsvara best við endamálið, at loyvishavarnir hava samábyrgd. Skotið verður eisini upp, at ábyrgdin samsvarandi regluni í § 34 er óavmarkað. Seinasta brotið í regluni ger tað tó møguligt, at loyvishavarnir á sama hátt sum í grannalondum okkara kunnu stovna ein grunn at gjalda skaðabøtur sambært § 35, t.v.s. at farast kann fyrst eftir grunninum. Grunnurin kann annaðhvørt verða stovnaður av loyvishavunum sjálvum, men kann eisini – eftir samráðingar við loyvishavarnar - hugsast at verða stovnaður sambært reglum, ið landsstýrið hevur lýst sambært § 37, stk. 2. Í hesum reglum kann verða ásett, at hann, ið krevur skaðabøtur,

í fyrsta umfari skal venda sær til grunnin. Hóast grunnurin verður stovnaður hava loyvishavarnir framvegis samábyrgd og kann hann, tó krevur skaðabøtur, tí seta fram krav sín beinleiðis móti einum ella fleiri av loyvishavunum, er ikki nóg mikið av peningi í grunninum.

Krav um skaðabøtur eftir § 35 kann ikki verða sett fram, um treytirnar at fáa endurgjald eftir § 34 eru til staðar. Skaðabótanevndin eigur tí at vísa honum, ið krevur skaðabøtur, til skaðavoldaran, er hann kendur. Verður hann, ið krevur skaðabøtur, vístur til skaðavoldaran, kann hann, hóast rættargangsfreistir í reglum givnum sambært § 37, stk. 2, seta krav sítt um skaðabøtur fram av nýggjum, hevur tað verið ógjørligt í samráðingum við skaðavoldnum ella undir rættarmáli við dómstólarnar at fáa endurgjald sambært endurgjaldsreglunum eftir § 34, tíðin er tó ein forbreyt, at kravmarin heldur seg kunna gera sannlíkt, at treytirnar fyri at veita endurgjald eftir § 35 eru loknar.

Undir regluna kotna skaðabøtur fyri skaða og tap, sum er valt inni á føroyskum sjóøki og/ella innanfyri fiskimarkið, um tað má haldast, at skaðagripirnir stava frá kolvetnisvirksemi í gildisøki lógarinnar, smh. § 1, stk. 1. Ikki kann verða roknað við skaðabótum í teimum førum, har skaðin ella tapið eru hend undir sigling ella fiskiskapi á bannaðum økjum, eitt nú trygdar- ella arbeiðsøkjum, á økjum, har ikki er loyvt at ankra upp ella á økjum, har ikki er loyvt at trola.

Sambært regluni kunnu skaðabøtur veitast fyri skaldan fiskireiðskap, skadd fiskiskip og -før, umframt mista veiðu og fiskitíð. Sama er galdandi fyri mista fiskitíð í sambandi við merking, uppfløku og uppskiping av lutum, ið stava frá kolvetnisvirkseminum.

Við veiðumiss skilst tann fiskur, sum fingin var, tá skaðin hendi, men sum fer fyri skeyti ella minkar í virði orsakað av skaðanum.

Mist fiskitíð er rímilig tíð, ið neyðug er at fáa skadda skipið ella skaddu útgerðina í brúkiligan stand ella eyka reiðskap klárar at brúka. Tá støddin av skaðabótum fyri mista veiðutíð verður ásett skal havast í huga, um tað er vanligt at hann, ið krevur, hevur eykaútgerð umborð ella í landi.

Við merking, uppfløku og uppskiping skal hann, ið krevur endurgjald, gera sannlíkt, at hetta var neyðugt at fyribyrgja hóttandi vanda fyri siglingartrygdina.

Landsstýrið kann við heimild í § 37, stk. 2 gera nærri reglur um mannagongd í sambandi við krav um skaðabøtur. Víst verður tí til viðmerkingarnar til § 37, stk. 2.

§ 36. Loyvi ella góðkenning eftir §§ 14, 18, 19 ella 20 til fyritakssemi í sjóøkinum og landgrunninum, sum verður til hindurs ella ampa fyri fiskiskapi, ið vanliga hevur verið rikin av føroyskum fiskiførum har á leiðini, verða ikki givin, uttan so at landsstýrið samstundis tekur avgerð um at loyvishavin veitir eigarum, reiðarum og manning, hvørs inntøkumøguleikar verða skerdir av fyritaksseminum, skaðabøtur, ella landsstýrið hevur sent skaðabótanevndini eftir § 37 málið til avgerðar.

Viðmerkingar

Hetta er reglan viðgerð spurningin um skaðabøtur til eigarar, reiðarar og manning á fiskiførum, hvørs inntøkumøguleikar verða skerdir orsakað av forðingum ella trupulleikum av einari leiðbygging, rørleiðing ella avrigging av oljuleiðslu. Havstøðir kunnu troðka fiskiskapin av miðunum. Hetta fer neyvan at ávirka mongdina av tí fiski, tað fæst, men kann fara at gera tað neyðugt at umleggja fiskiskapin. Ein slík umlegging kann í ávísum førum føra til skerjing av veiðini ella gera fiskiskapin truplari og harav rakstrartyngri, og, tá ringast velt við, forða ávísum fiskiskapi heilt.

§ 36 byggir á ta forbreyt, at hesar reglur eru neyðugar, av tí at rætturin at reka fiskiskap er ikki vardur av vanligum endurgjaldsreglum. Teir, ið reka fiskiskap, eiga ikki fiskin, sí § 2 í løgtingslóg nr. 28 frá 10. mars

1994 um vinnuligan fiskiskap. Harafturat kemur, at fiskivinna sambært altjóða rætti ongan framíhjárætt hevur í mun til aðra lógliga troyting av tilfeingjunum á landgrunninum. Gransking og gagnnýting av náttúrurikidømunum á landgrunnfnum mugu kortini ikki hava við sær óheimilaðar trupulleikar fyri sigling og fiskivinnu ella verðveitslu av heimsins livandi ríkidømi, smb. landgrunnsáttmálan § 5(1).

Vanliga stendst ampin ella fordingin av, at havstøðir taka nógv pláss. Umframt plássið, sum støðin sjálv stendur á, má roknast við trygdarøkjum, smb. § 27, stk. 1. Tílík trygdarøki eru ikki við rørleiðingar, men eisini í hesum førum kunnu ávísar avmarkingar verða gjørdar, smb. § 27, stk. 2.

Sambært altjóða rætti eru trygdarøkini vanliga 500 metrar við roknað frá útsíðuni av havstøðini. Harafturat kunnu avmarkingar uttanfyri trygdarøkini koma uppá tal, eftt nú bann móti fiskiskapi og uppankring ella á tann hátt, at fiskiskapur verður forðaður í royndum, t.d. orsakað av nógvari skipaferðslu til og frá støðunum ella tí at so stutt er millum trygdarøkini, at tað er ikki fiskandi.

Tey tiltøk, ið reglan vísir til, kunnu føra til, at tað ikki fiskast á einum øki í langar tíðir. Ein leiðbygging ger vanliga at framleiðsluevndir, ið verða brúktar í áravís, krevja trygdarøki í tilsvarandi langa tíð. Hinvegin fara rørleiðingar í ávísum førum bert at føra til fyribils tarn ella trupulleikar hjá fiskiskapinum, av tí at rørleiðingarnar ikki vanliga forða fiskiskapinum. Sambært reglum kunnu ikki allir trupulleikar fyri fiskivinnuna fáa skaðabøtur. Treytirnar fyri at fáa skaðabøtur eru tvinnar:

1) tiltakið er til hindurs ella ampa fyri vinnuligan fiskiskap, ið vanliga hevur verið rikin á leiðini,

2) inntøkumøguleikarnir verða skerdir orsakað av tiltøkunum.

Av hesum fylgir at tað skal vera ógjørligt at fiska á ávísum øki ella munandi truplari, kann talan verða um skaðabøtur. Fiskivinnan noyðist sostatt at tola, at fiskiskapurin verður ávirkaður av oljuvinnuni í ávísan mun, og har ikki er talan um munandi ávirkan, verður hildið, at fiskivinnan noyðist at laga seg eftir broyttum umstøðum.

Hvussu høg *gátrin* verður, sum fiskivinnan má fara uppum uttan skaðabøtur, má verða avgjørt í hvørjum fari sær av landsstýrinum ella skaðabótanevndini. Í tílíkum metingum mugu verða havd í huga viðurskifti sum, hvat fiskað hevur verið á leiðini, støddd og slag av oljuvinnuni, veður- og streymviðurskifti, møguleikin hjá fiskiflotanum at troyta aðrar leiðir og alternativir fiskimøguleikar í viðkomandi øki. Tað hevur ikki verið hildið at vera skilagott at seta fastar og avgjørdar reglur frammanundan fyri, um skaðabøtur eiga at verða veittar ella ei. Hesin spurningurin, eins og spurningurin um býtið av skaðabótunum millum ymiskar veiðuhættir og millum reiðarí og manning, má verða svaraður í teimum avgerðum, sum nevndin tekur í tílíkum málum.

Roknað verður við, at sum høvuðsregla verður talan um eina upphædd einaferð, men eftir umstøðunum kunnu verða goldnar árligar upphæddir í eitt áramál. Tá gjaldshátturin verður ásettur, kunnu m.a. møguleikarnir hjá fiskiflotanum at leggja um til alternativa veiðu verða havdir í huga.

Tað fylgir av reglini, at landsstýrið ikki kann loyva ella góðkenna nýkur av umrøddu tiltøkum, uttan at støða samstundis verður tikin til skaðabótaspurningin. Hetta kann verða gjørt, annaðhvørt soleiðis at landsstýrið tekur avgerð um skaðabøtur ella vísir málinum til skaðabótanevndina, smb. § 37. Royndirnar í Danmark, har ein lík skipan finst í lógini um havfiskiskap, vísa, at málini vanliga verða víst til nevndina, m.a. av tí at spurningurin um skaðabøtur ikki er nóg væl lýstur, tá loyvi ella góðkenningar skulu veitast. Verður málið víst til nevndina, kann loyvishavin fara undir ætlaða virksemið, samstundis sum fiskimenninir vita, at støða verður tikin til spurningin um skaðabøtur.

Reglan hindrar ikki loyvishavanum og avvarðandi fiskimonnum at gera avtalu sínamillum um skaðabøtur, og at fiskimenninir í hesum viðfangi frásiga sær rættin til at seta fram meirkrav eftir § 37 í lógini.

Tað er ein fortreyt, at teir fiskimenn, ið seta fram krav, skulu prógva, at treytirnar fyri at fáa skaðabøtur eru loknar. Í hesum sambandi er tað ikki óhugsandi, at eitt yrkisfelag tekur sær av málinum fyri limirnar, men hóast krav verður sett fram undir einum, má tað prógvast fyri hvørt reiðarí/skip sær, at treytirnar eru loknar.

§ 37. Ein skaðabótanevnd við 5 limum ger av um tap er ella verður valt, og um skaðabøtur eiga at verða veittar eftir § 35 ella, tá landsstýrið hevur sent nevndini mál til viðgerðar, eftir § 36. Loyvishavarnir uppnevna í felag 2 limir, meðan felagsskapir umboðandi føroyskar skipaeigarar, reiðarar og manning á fiskifórum í felag uppnevna 2 limir. Partsumboðini í nevndini uppnevna í felag nevndarformannin, ið skal lúka treytirnar fyri at gerast landsdómari. Fæst ikki semja um formannin, verður hann uppnevndur av soriinskrivaranum.
Stk. 2. Loyvishavarnir rinda útreiðslurnar til skaðabøtur og rakstur av nevndini sambært reglum, ið landsstýrið ásetir. Landsstýrið kann gera av, at gjald skal rindast fyri viðgerð av málum í nevndini. Í aðrar mátar er gerðarrættarlógin galdandi. Landsstýrið kann harumframt áseta reglur um skaðabótagrunn, smb. § 35.

Viðmerkingar
Stk. 1 ásetir, at mál um skaðabøtur eftir § 35 verða avgjørd av einari skaðabótanevnd. Sama er galdandi fyri mál eftir § 36, um landsstýrið hevur vist tílíkum máli til nevndina. Harafturat verður ásett, hvussu nevndin verður vald.

Sambært uppskotinum verða 5 limir í nevndini, tveir valdir av loyvishavunum og tveir av fiskivinnufeløgunum. Við loyvishavar skilst teir, ið loyvi hava eftir hesi lóg, t.e. forkanningarloyvi, leitingar- og framleiðsluloyvi, rørleiðingarloyvi og avriggingarloyvi eftir § 20.

Tað skilst av lógartekstinum, at fiskivinnusíðan eigur at verða umboðað av bæði eigarunum og manningarfeløgunum. Nevndu felagsskapir noyðast tí — á sama hátt sum loyvishavarnir · at semjast um at velja sínar 2 limir í nevndina.

Formaðurin í nevndini verður valdur av partsumboðunum í felag og skal hann lúka treytirnar í rættargangslógini fyri at verða útnevndur til landsdómara. Krøvini eru í høvuðsheitum, at hann skal hava verið býrættardómari, politimeistari, sakførari við rætti at møta fyri landsrætti ella vera løgfrøðingur, sum í 3 ár ella longri tíð hevur verið starvssettur í meginumsitingini sum fultrúi ella í hægri starvi. Semjast partarnir ikki um formannin, verður hann útnevndur av soriinskrivaranum.

Stk. 2 ásetir, at loyvishavarnir rinda útreiðslurnar til skaðabøtur og rikstur av skaðabótanevndini. Landsstýrið kann áseta gjøllari reglur um útreiðslurnar av nevndini, herundir eisini reglur um avgjøld fyri mál, viðgjørd av nevndini.

Gerðarrættarlógin, t.v.s. lóg nr. 181 frá 24. mai 1972, sum er sett í gildi fyri Føroyar við fyriskipan nr. 460 frá 9. september 1975 er annars galdandi fyri tey mál, ið viðgjørd verða av nevndini.

Landsstýrið kann harumframt áseta gjøllari reglur um málsviðgerðina í sambandi við mál, ið avgjørd verða av nevndini, her verður m.a. lagsað um reglur um fráboðan til fiskiveiðieftirlitið um skreddan reiðskap, fráboðanarfreistir v.m.

§ 38. Loyvi eftir hesi lóg eru undantikin rættarsókn og kunnu hvørki beinleiðis ella óbeinleðis avhendast uttan so at landsstýrið gevur loyvi til tess og góðkennir treytirnar.

Viðmerkingar
At loyvi eftir hesi lóg eru undantikin rættarsókn merkir, at útrøka ikki kann verða gjørd í loyvinum, og at loyvið ikki kemur undir trotabúarviðgerð. Fer loyvishavi á fiskasagang, kann loyvið verða tikið aftur, smb. § 39, stk. 1, litra e.

Endamálið við kravinum um góðkenning av avhendingum er at tryggja, at loyvið bert verður avhent til fyritøkur, sum fóka krøvini eftir § 6 í lógini. At loyvið hvørki beinleiðis ella óbeinleiðis kunnu verða avhend uttan landsstýrisins samtykki merkir, at ikki bert avhendingar, ið formliga líkjast avhendingum krevja loyvi. Avhending kann verða gjørd óbeinleiðis sum avhending av partabrøvum, ið kunnu geva avgerandi ávirkan í felagnum ella sum avtalur, ið hava somu avleiðingar. Reglan er eisini galdandi fyri innanhýsis avhendingar millum fleiri, sum hava eitt loyvi í felag.

§ 39. Landsstýrið kann taka eitt loyvi aftur
a) verða lógin, reglur ásettar sambært lógini, treytir og boð brotin grovliga ella ferð eftir ferð,
b) verða í umsókn um loyvi givnar skeivar ella villleiðandi upplýsingar,
c) boðar loyvishavin frá gjaldsstaðgi, biður um samráðingar um neyðskuldarsemju, fer á húsagang ella í likvidatión ella kemur í líka støðu.

Stk. 2. Fær loyvishavin bøtt fyri sær, tekst loyvið ikki aftur eftir stk. 1, litra a, fyrr enn landsstýrið hevur givið boð um at viðurskiftini skulu verða rættað innan ávísa freist, og boðini eru ikki fylgd.

Viðmerkingar
Sambært **stk. 1** kann landsstýrið m. a. taka loyvi aftur, um tær reglur, ásettar eru í lógini ella fyriskipanum sambært lógini, treytum ella boðum, **ikki** eru loknar. Í teimum førum, nevnd eru í stk. 1, litra a, kann eitt loyvi bert verða tikið aftur eftir **stk.** 2 um landsstýrið hevur givið boð um, at viðurskiftini skula vera rættað innan ávísa freist, og boðini eru ikki fylgd.

Er eitt loyvi givið fleiri feløgum, verður afturtøka galdandi fyri øll. Afturtøkan verður harafturat galdandi fyri alt økið, ið loyvið fevnir um.

Reglan í stk. 1, litra b hevur til endamáls at tryggja, at loyvi eftir lógini altíð verða veitt við grund í røttum upplýsingum.

§ 40. Í loyvi kann ásetast, at ósemja millum landsstýrið og loyvishavan um, hvørt reglur ella treytir sambært hesi lóg ella í reglum ásettum sambært lógini ella í loyvi ella góðkenning, eru loknar, kann verða løgd fyri gerðarrætt til endaliga avgerð.

Viðmerkingar
Sambært regluni er heimild at seta gerðarrættarreglur í tey loyvi, ið veitt verða sambært lógini.

Verður mál lagt fyri gerðarrætt fæst ofta skjótari avgerð og gerðarrætturin kann verða mannaður við serliga sakkønum. Nærri reglur um val av gerðarrættarlimum, myndugleika, málsviðgerð v.m. kunnu verða avtalaðar í hvørjum einkultum føri ella ásettar frammanundan í loyvunum.

§ 41. Tá ræður um reglurnar í sjólógini um avmarking av ábyrgd fyri flýtandi havstøðir, ið sjólógin fatar um, ábyrgist reiðarin, um ábyrgd er avmarkað, við upp til 20 milliónum SDR, sama hvussu stór havstøðin er. Ræður um fólkaskaða verður hendan upphæddin hækkað við 12 milliónum SDR.
Stk. 2. Endurgjald fyri dálkingarskaðar av kolvetnisvirksemi hevur ikki sjóveð eftir reglunum í sjólógini.
Stk. 3. Hevur reiðarin loyvi eftir § 6 til leiting eftir og framleiðslu av kolvetnum, galda reglurnar um avmarking av ábyrgd reiðarans ikki.

Viðmerkingar
Reglan, sum bert er galdandi fyri flytandi havstøðir, ásetir serligar avmarkingar av ábyrgd reiðarans fyri skaðar, ið henda í sambandi við leitingar- og framleiðsluvirksemi frá tilíkum støðum, og ger harafturat av, at endurgjald fyri dálkingarskaðar orsakað av hesum virksemi ikki eru tryggjað við sjóveðratti eftir reglunum í sjólógini. Hesar serligu reglur, ið galda fyri reiðaran av eini støð, avmarka ikki skyldur loyvishavans sambært reglunum í kolvetnisvirksemislógini. Tað verður sostatt ikki gjørligt hjá einum reiðara, ið er loyv-

ishavi eftir hesi lóg, og hvørs virksemi verður rikið eftir leitingar- og framleiðsluloyvi, at avmarka sína ábyrgd eftir sjólógini. Tilsvarandi reglur eru at finna í § 20 í donsku lógini um havstøðir og í § 507 í norsku sjólógini.

Tær í **stk. 1** nevndu avmarkingarupphæddir eru ikki galdandi fyri havstøð undir sigling og sleiping ella í heila tikið, tá havstøðin ikki kemur undir gildisøki, smb. § 1, stk. 1, ella kemur undir reglurna í § 2, litra b). Í hesum førum galda vanligu avmarkingarupphæddirnar í sjólógini.

Við SDR skiljast tey serligu dráttarrættindini, ið brúkt verða av altjóða valutagrunninum IMF. Í lógaruppskotinum eru ongar serligar reglur ásettar um tíðarskeiðið fyri umrokning av SDR til danskan pening. Umrokningin má tí verða gjørd samsvarandi teimum til hvørja tí í sjólógini galdandi reglunum.

Tá skaðuevnið hjá støðini í boriskeiðnum ikki kann haldast at broytast við tonsatalinum, hevur tað verið hildið skilagott, at avmarkingarupphæddin ikki verður ásett við grundarlagi í veruliga tonsatalinum. Ístaðin fyri verður tí skotin ein føst avmarkingarupphædd upp ljóðandi uppá 20 miliónir SDR, ein upphæld sum er næstan 50% størri enn mesta markið fyri ábyrgd eftir 1969-sáttmálanum fyri ábyrgd tangaskipa fyri oljuskaðum.

Er mannskaði hendur verður skotið upp, at upphæddin verður hækkað við 12 miliónum SDR. Er serliga persónavmarkingarupphæddin uppá 12 miliónir SDR ikki nóg stór til at svara til krøvini orsakað av fólkaskaða, kann verða roynt at fáa tann óroldna partin av mannskaðakrøvunum goldnar á jøvnum føti við tingsskaðakrøv av teimum 20 miliónunum SDR. Verða hjálpifør, ein nú sleipibátar, nýtt í leitingar- ella framleiðsluvirkseminum, kemur eigarin av havstøðini undir ábyrgd eftir § 233 í sjólógini fyri skaðar, sum tilfk hjálpifør veita.

Stk. 2 ásetir, at endurgjald fyri dálkingarskaðar orsakaðir av leitingar- ella framleiðsluvirksemi eru ikki tryggjaðir við sjóveðrætti. Við sjóveðrætt skilst lógásettur veðrættur í skipi ella last. Sjóveðrættur í skipi kann ikki verða skrásettur í skipaskránni og hevur ta rættarstøðu, sum ásett er í sjólógini, sjálvt uttan skráseting. Haldast má, at sjóveðrættur til trygd av dálkingarskaðum orsakað av leitingar- ella framleiðsluvirksemi hevði gjørt tað munandi tortørari at tikið lán við trygd í havstøðir v.m.

Stk. 3 ásetir, at reiðarin ikki kann avmarka sína partleysu (objektivu) og óavmarkaðu ábyrgd sambært § 34 í hesari lóg, um hann sambært hesi lógini hevur loyvi til leiting eftir og framleiðslu av kolvetnum, og viðkomandi arbeiðir haraftrat eru umfatað av loyvunum. Í hesum fylgir eitt nú, at ein loyvishavi, hvørs skip voldir skaða við arbeiði umfatað av lógini, ikki kann avmarka sína ábyrgd eftir reglunum í sjólógini um ábyrgdaravmarking.

§ 42. Landsstýrið kann sum neyðugt er loyva, at føst ogn verður ognartikin til virksemi eftir hesi lóg.
Stk. 2. Kanningar, ið ikki taka langa tíð, og sum hava til endamáls at fremja fyritakssemi eftir hesi lóg, kann landsstýrið loyva á annansmans ogn, bóast tað kann hava við sær skaða ella ampa, ið fult endurgjald verður at veita fyri.
Stk. 3. Ognartøka eftir stk. 1 verður framd sambært reglunum í lóg nr. 63 frá 7. mai 1881 um skyldu at lata lendi til almennar vegir, havnir og lendingar umframt almennar skúlar í Føroyum. Sama er galdandi fyri avgerðir eftir stk. 2, fæst ikki semja um endurgjaldið.

Viðmerkingar
Reglan í **stk. 2** hevur til endamáls at gera tað møguligt gera neyðugar tekniskar kanningar í forum, eitt nú sum við seismiskum kanningum, har ikki er neyðugt at taka lendið ella áleggja varðandi ræðisavmarkingar.

§ 43. Við bót ella hefti verður hann revsaður, sum
a) rekur virksemi nevnt í §§ 4, 6, 18 og 19 uttan loyvi landsstýrisins,

b) riggar virkið av uttan góðkenning landsstýrisins eftir § 20. stk. 1 ella letur ikki rættsstundis inn nøktandi avriggingaraetlan eftir § 20. stk. 3,
c) hýlur §§ 23, 25 ella 26, ella letur ikki inn stakroyndir og nørur upplýsingar eftir § 11, ella forðar fyri kanning, nevndar í § 28, stk. 2,
d) aktar ikki boð, givin eftir hesi lóg ella fyriskipanir, ásettar við heimild í lógini.

Stk. 2. Verður § 23 brotin, kann arbeiðsgevari bøta, sjálvt um brotið ikki er framt tilætlað ella av ósketni.

Stk. 3. Í fyriskipanum, ásettum við heimild í lógini, kann ásetast revsing, sum bót ella hefti fyri brot av reglunum í fyriskipanunum. Hisini kann ásetast, at arbeiðsgevari, sum brýtur reglurnar, boð ella forboð sum ásett, kann bøta, sjálvt um brotið ikki er framt tilætlað ella av ósketni. Umskiftisrevsing verður ikki ásett fyri bót.

Stk. 4. Verður brotið framt av partafelagi, smápartafelagi, lutafelagi ella líkum felagum, kann bótin verða kravd av felagnum sjálvum.

Viðmerkingar

Stk. 3 loyvir, at revsireglur verða ásettar í reglum lýstar sambært lógini. Stk. 3, 2. pkt. ger tað møguligt, eins og í § 21, stk. 2 í donsku lógini um havstøðir, at áleggja bót, men ikki hefti ella fongsul fyri brot móti reglum, sum eru lýstar sambært lógini, hóast arbeiðsgevarin ikki hevur borið seg óforsvarliga at (partleys ábyrgd). Tað er ein fortreyt, at henda ábyrgd bert verður áløgd í sambandi við ásetingar av reglum sambært tær reglur í lógini, sum hava størstan týdningin fyri trygd og heilsuviðurskifti á havstøðum.

Stk. 4 ger tað møguligt at áleggja ábyrgdina, eisini í teimum førum bar eitt felag (løgfrøðiligur persónur) er við í lógarbrotinum.

§ 45. Henda lóg kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

Stk. 2. Løgtinglóg nr. 179 frá 21. oktober 1993 um forkanningar o.a.m. av undirgrund Føroya verður sett úr gildi.

Viðmerkingar

Roknað verður við, at kunngerð nr. 10 frá 15. februar 1996, sum broytt við kunngerð nr. 50 frá 9. mei 1997, ið er lýst við heimild í forkanningarlógini, verður verandi í gildi, inntil hon verður broytt ella avtikin við nýggjari kunngerð.

Harumframt verða loyvi latin við heimild í forkanningarlógini og omanfyri nevndu kunngerð verandi í gildi, inntil tey ganga út eftir teimum reglum, sum standa í loyvunum. Galdandi forkanningarloyvi eru í gildi í eitt ár, roknað frá tí degi, tey vórðu latin, og loyvini, sum í løtuni eru í gildi, fara í flestu førum úr gildi tíðliga í 1998.

1. viðgerð 21. november 1997. Uppskotið varð beint í vinnunevndina, sum fríggjadagin 13. februar 1998 legði fram soljóðandi:

Álit

Málið er lagt fram av landsstýrinum tann 18. november 1997 og eftir 1. viðgerð tann 21. november 1997 beint í vinnunevndina.

Vinnunevndin hevur viðgjørt málið og hevur undir viðgerðini havt fund við logmann, stjóran á vinnumála deildini, stjóran á oljumálaleildini, deildarleiðaran í umhvørvismálum á Heilsufrøðiligu Starvsstovuni, Halgir W. Poulsen, advokat, stjóran úr Tryggingarsambandinum, umboð fyri Brunaumsjón Landsins, umboð fyri Føroya Oljufelag og umboð fyri Føroya Arbeiðsgevarafelag.

Kolvetnisvirksemi verður nýggj vinna í Føroyum, og fyrst olja her, kemur hon fullkomiliga at broyta føroyska samfelagið. Fyriliggjandi uppskot er eitt av teimum týdningarmestu, ið Føroya løgting kemur at taka

støðu til. Fyrireikingararbeiðið hevur verið bæði stórt og nágreiniligt, bólkingurin frá Oljuráðleggingarnevndini. Eisini tingmenn hava fyrireikað seg. Undan viðgerðini í løgtinginum hava løgtingslimir verið til fundir og skeið um lóggávuna og um hetta fyri føroyingar nýggja økið sum beild. Eisini hevur vinnunevndin í døgunum 14.-21. oktober 1997 verið á kunningarferð í Noregi.

Til lógaruppskotið um kolvetni hevur Oljuráðleggingarnevndin hugt eftir lóggávuni um kolvetni í grannalondunum og har serliga nýtt norska lóggávu sum fyrimynd. Norðmenn byrjaðu kolvetnisvirksemi fyri 30 árum síðani, og vit hava tí nógv at læra av teimum, bæði hvat teir hava gjørt rætt og ikki minst, hvat norðmenn hava gjørt við minni góðum úrslitum. Vinnunevndin vitjaði á Noregsferðini noreskar myndugleikar - bæði almennar og kommunalar - vitjaði oljufeløg og fyritøkur kring oljuvinnuna.

Eitt av tí, ið gekk aftur allastaðni, var, at vit føroyingar eiga at vera varnir. Dømi vóru í Noregi um bygdasamfeløg, sum ræktiliga blómaðu av oljuvinnuni, men eisini vóru dømir um tað øvugta, fálkað økir, sum í vónini høvdu gjørt stórar fløgur, men einki virksemi fingu.

Oljufeløgini, ið nevndin vitjaði á ferðini, mæltu frá at seta teimum ov nógvar treytir, tí tað kom av sær sjálvum. Tey søgdu, at royndir allastaðni vístu, at lokal arbeiðsmegi/tænastuvinna og lokala økið vóru tey bíligastu í longdini. Harafturímóti vóru stórtingslimir ikki í iva um, at rætt er at seta treytir, sum innan rímilig mørk kunnu stýra kolvetnisvirkseminum út á so stóran part av landinum sum møguligt og samstundis kunnu ansa eftir, at nýggja virksemið ikki kollrennir annað virksemi.

Undir nevndarviðgerðini hevur vinnunevndin verið ígjøgnum øll øki og eisini tey øki, ið serliga vórðu umrødd undir 1. viðgerð í løgtinginum. Undir 1. viðgerð varð m.a. funnist at málbrúkinum í lógaruppskotinum, um orðingin í § 3 um, at "kolvetni hoyrir Føroyum til", er nøktandi, um løgtingið skal vera nøgt við hert, at frágreiðing verður løgd fyri løgtingið, áðrenn øki verða bjóðað út, og um krav skal verða sett í lógina um, at vørur skulu verða fluttar um føroyskan bryggjukant, og fólkaflutningur skal verða um føroyska floghavn.

Áðrenn fyrsta útbjóðingarumfar verður, skal - eins og í grannalondunum - samtykkjast ein serstøk oljuskattalóg. Løgmaður hevur upplýst fyri nevndini, at arbeiðið við hesi skattalóg er komið undir land og verður lagt fyri løgtingið fyrsta dagin. Somuleiðis er við nýggjari havumhvørvislóg, har upplýst er, at ríkislógartilmæli hesum viðvíkjandi verður lagt fyri tingið í næstum. Út frá hesum skuldi einki lógararbeiði verið til hindurs fyri, at fyrsta útbjóðingarumfar, sum ætlað, kann verða í 1998. Vinnunevndin heldur, at føroyingar eiga at royna at halda ta tíðarætlan, sum er send út í heimin, og sum oljufeløg hava arbeitt eftir, t.e. at hava fyrsta útbjóðingarumfar í ár.

Vinnunevndin hevur kannað, í hvønn mun sjálv seismikkskjótingin ávirkar fiskiskapin. Norðmenn hava gjørt nógvar kanningar hesum viðvíkjandi, og hevur vinnunevndin útvegað tilfar frá hesum kanningum. Viðlagt er avrit av samandrátti frá seismiskari frágreiðing frá Havforskningsinstituttet í Bergen um avleiðingar fyri fisk og fiskiskap av seismiskari skjóting (skjal 1).

Hesar royndir vísa m.a., at fiskiskapurin í einum øki, har seismikkur er skotin, er ávirkaður í upp til 5 dagar eftir skjótingina. Upplýst er fyri nevndini, at tvær kærur eru komnar til landsstýrið frá veiðifeløgum um ávirkan á fiskiskapin av seismikkskjóting. Landsstýrið hevur upplýst fyri nevndini, at saman við seismikk loyvinum er kort lagt við, soleiðis at feløg kunnu taka hædd fyri, hvør fiskiskapur er á ávísu leiðunum til ávísa tíð. Landsstýrið ásannar, at kortið treingir til at dagførast fyri betur at tryggja fiskiskapin, og at upplýsingin um, nær og hvar seismikkur verður skotin, eigur at vera nógv betri.

Bert eitt mál um endurgjald hevur verið, tá bátur av seismikkskipi varð biðin um at kvetta línu. Hesin fekk fult endurgjald fyri útgerð og veiðu.

Vinnunevndin heitir á landsstýrið um at bera so í bandi, at seismikkurin órógvar fiskiskapin sum minst.

Higartil hava ongar reglur verið um, at seismisk feløg skulu verða skrásett í Føroyum ella á annan hátt knýtt at Føroyum, meðan tey gera kanningar.

Vinnunevndin er samd um, at tað í loyvum til seismikkskjótting eigur at verða treytað, at seismikkfeløg arbeiða út frá Føroyum í mest møguligan mun, bæði av vinnuligum orsøkum og vegna staðlest skaðaárin á fiskiskapin. Heitt verður á landsstýrið um í minsta lagi 14 dagar, áðrenn seismikkskjótting fer fram, at boða fiskiveiðifeløgunum frá øllum seismikkvirksemi við nágreiniligari tilskilan av øki og tíðarkarmi og at seta í verk trygga frálboðanarskipan lutvum viðvíkjandi, og at skipa so fyri, at allar treytir verða fylgdar út í æsir. Forkanningarskeiðið er farið um hæddina, og nú stendur leitiskeiðið fyri framman. Finst olja ella gass, koma vit til útbyggingar- og útvinningarskeiðið. Til leitiskeiðið verður útbjóðing gjørd, har avgjørt er, hvørji øki verða bjóðað út, og hvørjar treytir verða settar. Hetta eru tvey avgerandi punkt fyri, hvussu fiskiskapurin verður ávirkaður, og hvar virksemið av kolvetnisvinnuni verður í Føroyum. Verður olja ella gass funnið, verður gjørd ein útbyggingarætlan, sum m.a. neyvt ásetir, hvussu virksemið verður. Í hesum skeiði er talan um tað stóra virksemið og harvið stóra ávirkan á samfelagið - bæði positivt og negativt.

Vinnunevndin hevur hugt at, hvussu samspælið millum stjórn og parlament er í ávikavist Noregi og Danmark í útbjóðingini og í útbyggingarætlanini.

Í sambandi við útbjóðingarumfør er í Noregi fann siðvenja, at stjórnin leggur fyri Stórtingið uppskot um, hvørji øki ætlanin er at bjóða út. Tá olja ella gass er funnið, og leiðin skal byggjast út, verður sama mannagongd brúkt, um ætlað verður, at leiðútbyggingin fer at kosta meira enn 5. mia. Nkr.

Í Danmark verður uppskot ikki lagt fyri Fólkatingið, men har skal, sambært undirgrundarlógini, Folketingets Energipolitiske Udvalg hoyrast um útbjóðing, og um hvør skal hava loyvi, áðrenn stjórnin kann føra tað út í lívið.

Sambært fyriliggjandi uppskoti skal løgtingið hvørki góðkenna útbjóðing, loyvi ella útbygging. Tað einasta, landsstýrið skal gera, er at leggja eina frágreiðing (§ 7) fyri løgtingið um, hvørji øki ætlanin er at bjóða út, og um almennu treytirnar, ætlanin er at seta, og síðani kann landsstýrið bjóða út. Ikki er neyðugt við tingsins samtykt.

Í sambandi við útbygging og framleiðslu krevst heldur ikki, at landsstýrið leggur eina frágreiðing fyri løgtingið. Hesi viðurskifti kann landsstýrið taka avgerð um, um landsstýrið vil, sjálvt uttan at kunna løgtingið um tað. (§ 14).

Vinnunevndin heldur, at heimildir landsstýrisins ikki eiga at verða størri enn í grannalondunum. Vinnunevndin hevur tí fingið løgtingsskrivstovuna at gera útgreining av spurninginum um, í hvønn mun stýrisskipanarlógin loyvir, at løgtingið skal góðkenna, hvørji øki verða bjóðað út, og hvørjar almennar treytir eiga at verða settar í hesum sambandi (skjal 2 og skjal 3 eru hjáløgd).

Sambært hesum omanfyrinevndu útgreiningum, ið vinnunevndin hevur fingið frá løgtingsskrivstovuni, loyvir føroyska stýrisskipanarlógin løgtinginum hvørki at nýta norska ella danska háttin um góðkenning frá parlamenti. Sambært útgreiningunum eru bert tveir møguleikar:

a) *Løgtingslóg:* Sett verður í kolvetnislógina, at útbjóðing og útbyggingarætlanir skulu samtykkjast við løgtingslóg.

b) *Frágreiðing viðfrest:* Sett verður í kolvetnislógina, at landsstýrið í góðari tíð frammanundan, t.d. ein mánað, hevur skyldu at upplýsa løgtingið um, hvørjar kunngerðir tað fer at gera við heimild í lóg, ella hvørjar støkiligar fyrisitingarligar avgerðir tað fer at taka, áðrenn avgerðin er løgfrøðiliga bindandi.

Nevndin heldur, at møguliga kundu aðrar tulkingar verið av stýrisskipanarlógini, men fyri at eingin ivi skal verða um tulkingina, hevur nevndin avgjørt at mæla til, at útbjóðing og útbyggingaraetlanir skulu ávikavist samtykkjast við løgtingslóg (§ 7) og lýsast í eini frágreiðing, ið verður løgd fyri løgtingið, 4 vikur áðrenn góðkenning verður givin (§ 14).

Talan er her um sera stórar avgerðir, sum koma at ávirka føroyska samfelagið munandi. Vinnunevndin heldur tí, at av hesum tveimum møguleikunum eigur møguleiki a) løgtingslóg at verða nýttur, tá talan er um útbjóðing (§ 7), og frágreiðing við freist tá talan er um útbyggingaraetlan (§ 14). Ein samd nevnd setir tí fram broytingaruppskot samsvarandi hesum.

Vinnunevndin heldur, at vit eiga at fyribyrgja óskipaðar og óneyðugar útbyggingarløgur. Eisini eigu vit at hava til endamáls at stýra kolvetnisvirksemnið út á so stóran part av landinum sum møguligt.

Nevndin heldur umframt, at løgtingið eigur at hava reguliigt oljupolitiskt orðaskifti við grundarlagi í eini frágreiðing frá landsstýrinum. Har eigur at verða tikið saman um tað farna, og framtíðaraetlanir viðgjørdar. Tílíkt orðaskifti skal geva landsstýrinum ábending um tingsins vilja.

Nevndin heldur tí, at landsstýrið í minsta lagi annað hvørt ár eigur at skipa fyri einum oljupolitiskum orðaskifti. Broytingaruppskot verður sett fram samsvarandi hesum.

Í fyriliggjandi uppskoti er ikki lógarkrav um, at allur flutningur av vørum og fólkaflutningur skal um føroyskan bryggjukant ella føroyska floghavn. Vinnunevndin er samd um, at hetta eigur at standa í lógini, men at landsstýrið í serligum førum kann geva undantak.

Eitt lógarkrav fer greitt at tryggja, at útgerðarstøðir verða lagdar í Føroyum, ábendingar eru longu um hetta. Við lógarkravi kunnu veitarar longu nú byrja at fyrireika seg. Lógarkrav tryggjar eisini, at føroyskar fyritøkur verða eftirspurdar og hava møguleikan at verða við frá byrjan. Føroyskar fyritøkur hava tí møguleikan bæði lættari og skjótari at verða kappingarførar - eisini í altjóða høpi.

Vinnunevndin heldur, at tílík lógarkrav er ein styrki í samráðingum, har oljufeløgini í serligum førum noyðast at samráðast um undantøk, meðan kravið frá føroyskari síðu, um at flutningur skal um føroyskt landøki, verður sjálvsagt.

At partur av seismiska virkseminum hevur verið gjørdur út frá grannalondunum í staðin fyri út frá Føroyum, styrkir vinnunevndina í, at hetta eigur at verða lógarkrav.

Upplýst er fyri nevndini, at nøkur av altjóða olju- og kontraktorfeløgum hava sagt, at teir ikki síggja eitt lógarkrav sum nakra forðing fyri teirra luttøku á føroyskum øki.

Ein samd vinnunevnd setir tí fram broytingaruppskot um, at allur flutningur av vørum og allur fólkaflutningur skal um føroyskan bryggjukant ella føroyska floghavn. Vinnunevndin mælir til, at landsstýrið í serligum førum kann geva undantøk frá hesi reglu. Sum høvuðsregla eigur henda undantaksregla tó ikki at verða nýtt.

Nevndin hevur eisini viðgjørt spurningin um leiklutin hjá vinnuni, nú føroyska samfelagið skal brynja seg til eina komandi oljuvinnu. Tað er umráðandi, at vinnan veit, hvat kemur, og nær tað kemur, og tí kann fyrireika seg og verða kappingarfør. Líka so umráðandi er tað hjá myndugleikunum at vita, hvussu væl brynjað føroysk vinna er á ymsu økjunum. Samstarvið millum hesar hevur tí stóran týdning fyri føroyska leiklutin í oljuvinnuni. Nevndin heldur, at tað eigur at verða eitt neyvt samstarv millum vinnuna og tað almenna í hesum spurningi, og at tað er umráðandi, at skjótt verður staðfest, hvussu hetta samstarvið skal verða. Vinnunevndin heitir á landsstýrið um at taka hædd fyri hesum spurningi.

Í § 3 í uppskoti landsstýrsins stendur "Kolvetni, nevnd eru í § 1, hoyra Føroyum til". Í álitinum frá oljuráðleggingarnevndini er skotið upp til somu grein at standa "Kolvetni, nevnd eru í § 1, hoyra landinum til".

Nevndin er komin eftir, at í eini reglu í P/F-lógini (ríkislóg) er ein treyt, at í nevnd fyri føroyska partafelag skal minst helmingurin búgva "her i landet". Hetta verður í dag tulkað sum, at minst helmingurin skal hava bústað í ríkinum.

Í grannalondunum verða í tílíkum orðingum sum í § 3 nýtt orðini "tilhoyra statinum" og ikki t.d. "hoyrir Noregi til" ella "hoyrir Danmark til". Hetta er helst tí, at tílíkur ognari er ringur at definera. Fyri at eingin ivi skal verða um hesa grein, mælir Vinnunevndin til, at her kemur at standa "Kolvetni, nevnd eru í § 1, hoyra Føroya landi til".

Í viðmerkingum landsstýrisins til §13 hevur landsstýrið gjørt vart við, at nøkur orð eru dottin burtur imillum. Í næsta setningi í fjórða reglubroti skal standa: "Tað er m.a. tí, at víst verður til § 13 í viðmerkingunum til § 14, stk. 2 um .....". Gjørt verður vart við hetta.

Nevndin er komin eftir, at tað í § 41 í uppskotinum er ósamsvar millum reglurnar í sjólógini og í kolvetnislógini. Neyðugt er tí við áseting í ríkislógini/sjólógini við tilvísing til reglurnar í kolvetnislógini. Fyrispurningur hevur verið settur fiskimálastýrinum hesum viðvíkjandi, og hevur nevndin fingið upplýst, at um ein broyting í sjólógini skal kunna vísa til § 41 í føroysku kolvetnislógini, er tað neyðugt, at kolvetnislógin er samtykt og kunngjørd. Upplýst er eisini, at landsstýrismaðurin í sjóvinnumálum hesa tingsetuna fer at leggja fyri løgtingið broytingar í sjólógini.

Í § 42 í uppskotinum frá landsstýrinum er komið at standa, at "Ognartøka eftir stk. 1 verður framd sambært reglunum í lóg nr. 63 frá 7. mai 1881". Nevndin er komin eftir, at tað skal verða sambært reglunum í lóg nr. 69 frá 7. mai 1881, og setir fram broytingaruppskot samsvarandi hesum.

Nevndin hevur eisini viðgjørt málbrúkið í lógaruppskotinum og er orðin samd um at seta fram uppskot um hesar málsligu broytingar:

Í § 1, stk. 2, 2. pkt., skal "verða" verða broytt til "vera".

Í § 2, ii. skal orðið "reiði" broytast til "rigg".

Í § 9 skal "rennandi avgjald" broytast til "loypandi avgjald".

Í § 13, stk. 1, skal "kolvetnisspelli" broytast til "kolvetnisspilli".

Í § 20, stk. 2, skal "rennur freistin" broytast til "gongur freistin".

Í § 26 skal "valda" broytast til "elva".

Í § 36 skal í niðasta reglu "eftir § 37" flytast upp í næstseinastu reglu aftan á "landsstýrið".

Eisini mælir nevndin til, at orðið "loyvisbavi" skal í øllum bendingum broytast til "loyvishavari" í øllum bendingum.

Ein samd vinnunevnd mælir við hesum viðmerkingum løgtinginum til at samtykkja uppskot landsstýrisins við niðanfyristandandi

broytingaruppskoti
til
uppskot landsstýrisins

1) Í § 1, stk. 2, 2. pkt., verður orðið "verða" broytt til "vera".

2) Í § 2, b, ii, verður orðið "reiði" broytt til "rigg".

3) § 3, stk. 1, 1. pkt., verður orðað soleiðis: "Kolvetni, nevnd eru í § 1, hoyra Føroya landi til."

4) Í § 7, stk. 1, verða orðini "sum meginregla" strikaði.

5) § 7, stk. 2, verður orðað soleiðis: "Áðrenn lýst verður eftir umsóknum, verður áseti í løgtingslóg, hvørji øki verða bjóðað út, og almennu treytirnar, ið setast skulu. Í viðmerkingunum til lógaruppskotið skal metast um, hvørjar avleiðingar kolvetnisvirksemið kann hava fyri sigling, fiskiskap og aðrar vinnur, náttúru-, umhvørvis- og onnur samfelagsáhugamál. Eisini verður mett um, hvat ískast virksemið fer at geva búskapi og arbeiðsvinnu".

6) Í § 9, 2. pkt., verða orðini "rennandi avgjald" broytt til "loypandi avgjald".

7) Í § 10 verður aftan á orðini "loyvishavin rekur virksemi sítt", sett orðini "herundir m.a. við útgerðarstøðum".

8) Sum nýggj § 11 verður sett inn soljóðandi áseting: "Í loyvum eftir § 6, skal verða áset, at allur flutningur av útgerð og fólki til og frá føroyskum øki skal fara um føroyskan bryggjukant ella føroyskan flogvøll. Stk. 2. Landsstýrið kann í serligum førum, gera undantak frá ásetingini í stk. 1."

9) Í § 13, stk. 1, 2. pkt., verður orðið "kolvetnisspelli" broytt til "kolvetnisspilli".

10) Aftan á § 14, stk. 5, verður sett nýtt stk. 6, ið verður soleiðis orðað: "4 vikur áðrenn avgjørt verður at góðkenna eina leiðbyggiætlan, leggur landsstýrið eina frágreiðing fyri løgtingið um, hvørjar almennar treytir landsstýrið setir fyri hesi góðkenning."

11) Í § 20, stk. 2, seinasta pkt., verða orðini "Rennur freistin" broytt til "Gongur freistin" og komma skal setast aftan á hesi orðini.

12) Í § 26, stk. 1, 1. pkt., verður orðið "valda" broytt til "elva".

13) § 36 verður orðað soleiðis: "§ 36. Loyvi ella góðkenning eftir §§ 14, 18, 19 ella 20 til fyritakssemi á sjóøkinum og landgrunninum, sum verður til bindurs ella ampa fyri fiskiskap, ið vanliga hevur verið rikin av føroyskum fiskifórum har á leiðini, verða ikki givin uttan so, at landsstýrið samstundis tekur avgerð um, at loyvishavarin veitir eigarum, reiðarum og manning, hvørs inntøkumøguleikar verða skerdir av fyritaksseminum, skaðabøtur, ella landsstýrið eftir § 37 hevur sent skaðabótanevndini málið til avgerðar."

14) Í § 42, stk. 3, 1. pkt., verða orðini "lóg nr. 63 frá 7. mai 1881" broyt til "lóg nr. 69 frá 7. mai 1881".

15) Sum nýggj § 43 verður sett inn soljóðandi áseting: "Landsstýrið skal í minsta lagi annað hvørt ár leggja fram fyri tingið frágreiðing, sum skal verða grundarlag fyri einum oljupolitiskum orðaskifti samhaert ásetingunum í Tingskipan Føroya Løgtings, fyrstu ferð í 1999".

16) "Loyvishavi" verður í øllum bendingum broytt til "loyvishavari" í øllum bendingum.

17) Í teim førum, greinanr. ella stk. verða sett inn ella strikað, verða eftirfylgjandi greinanr. og stk. og tilvísingar broyttar samsvarandi hesum.

Viðmerkingar:

Viðv. 1) -2) Málsligar broytingar.

Viðv. 3) Orðingin verður broytt, fyri at eingin ivi skal verða um, at ogmarrættarin er avmarkaður soleiðis, at kolvetni hoyra Føroya landi til. Mett verður harumframt, at "Føroya landi" er ein meira neyv orðing enn "Føroyum". Víst verður annars til almennu viðmerkingarnar omanfyri.

Viðv. 4) Greinin verður broytt soleiðis, at loyvi til leiting eftir og framleiðslu av kolvetnum bert kann veitast, eftir at lýst er eftir umsóknum. Broytingin hongur saman við broytingini í § 7, stk. 2, og er ynski, at tað ikki verða gjørd undantøk til kravið um, at tað skal verða løgtingið, ið skal taka avgerðina um, hvørji øki verða bjóðað út til leiting eftir og framleiðslu av kolvetnum.

Viðv. 5) Greinin verður broytt soleiðis, at tað verður løgtingið, ið tekur avgerð um, hvørji øki verða bjóðað út til leiting eftir og framleiðslu av kolvetnum, og hvørjar almennar treytir verða settar í hesum sambandi. Avgerðin um, hvørji øki skulu bjóðast út, og hvørjar almennar treytir skulu setast í hesum sambandi, verður mett at hava so stóran týdning, at hetta er ein avgerð, ið má leggjast fyri løgtingið í hvørjum einstøkum føri. Víst verður annars til almennu viðmerkingarnar omanfyri.

Viðv. 6) Málslig broyting.

Viðv. 7) Við hesi broyting kunnu óskipaðar og óneyðugar útbyggingarfløgur fyribyrgjast, og hevur hendan broyting samstundis til endamáls at stýra kolvetnisvirksemið út á so stóran part av landinum sum møguligt.

Viðv. 8) Tá loyvir verða givin sambært § 6, skal krav verða sett um, at allur flutningur av útgerð og fólki til og frá føroyskum øki skal fara um føroyskan bryggjukant ella føroyskan flogvøll. Treytirnar, ið setast skulu fyri forkannингarloyvum, skulu sambært § 5, stk. 2, setast av landsstýrinum, og er tað sostatt í hesum sambandi einki lógarkrav, at flutningur skal fara um føroyskan bryggjukant ella flogvøll. Tann flutningur, ið undantur er av kravinum í § 11, er allur flutningur av útgerð og fólki - bæði til og frá føroyskum øki - í sambandi við virksemi, ið verður framt sambært loyvi eftir § 6. Landsstýrið fær heimild til í serligum førum at gera undantak frá kravinum. Serligt føri, har undantak kann verða givið, kann til dømis verða, tá talan er um, flyting av boripallum. Víst verður annars til almennu viðmerkingarnar omanfyri.

Viðv. 9) Málslig broyting.

Viðv. 10) Um tingið ikki tekur undir við almennu treytunum, ið landsstýrið ætlar at seta fyri góðkenning av eini leiðbyggiætlan, skal tingið hava møguleika fyri at seta fram misálit soleiðis, at hendan leiðbyggiætlan ikki kann verða góðkend. Víst verður annars til viðmerkingarnar nr. 4 og 5.

Viðv. 11-13) Málsligar broytingar.

Viðv. 14) Tað er eitt mistak, at landsstýrið í uppskotinum hevur skrivað lóg nr. 63, lógin er nr. 69.

Viðv. 15) Sum broytingaruppskotini nr. 4, 5 og 9 skal ásetingin í § 43 styrkja um leiklutin hjá tinginum í førda oljupolitikkinum.

Viðv. 16) Málslig broyting.

Viðv. 17) Tekniskar broytingar.

Skjal 1

PROSJEKTRAPPORT

ISSN 0071-5638

HAVFORSKNINGSINSTITUTTET
MILJØ - RESSURS - HAVBRUK

Nordnesparken 2 Postboks 1870 5024 Bergen
Tlf.: 55 23 85 00 Fax: 55 23 85 31

Forskningsstasjonen	Austevoll	Matre
Flødevigen	Havbruksstasjon	Havbruksstasjon
4817 His	5392 Storebø	5198 Matredal
Tlf.: 37 01 05 80	Tlf.: 56 18 03 42	Tlf.: 56 36 60 40
Fax: 37 01 05 15	Fax: 56 18 03 98	Fax: 56 36 61 43

Distribusjon:
ÅPEN

HI-prosjektnr.:
92.01.2

Oppdragsgiver(e):
Fiskeridepartementet (a)
og Nærings- og
energidepartementet (b)

Oppdragsgivers referanse:
T. Hansen (a) og
J. A. Børresen (b)

Rapport:
FISKEN OG HAVET NR. 9 - 1996

Tittel:
SEISMISKE UNDERSØKELSER TIL HAVS:
EN VURDERING AV KONSEKVENSER
FOR FISK OG FISKERIER

Senter:
Marint Miljø

Seksjon:
Fysisk oseanografi og akustikk

Forfatter(e):
John Dalen, Egil Ona, Aud Vold Soldal og Roald
Sætre

Antall sider, vedlegg inkl.:
26

Dato:
14.juni 1996

Sammendrag:

I denne rapporten oppsummerer vi kunnskaper om effekter på fisk og fiskerier fra luftkanonskyting. Dette omhandler atferdspåvirkninger fra seismiske undersøkelser på fisk og hva dette kan bety for fangsttilgjengelighet for ulike redskaper og for gyting og vandring til gytefelt. Det omhandler videre direkte og indirekte dødelige effekter på larver og yngel som er satt inn i en verstetilfelle-vurdering og en forventningsverdivurdering for å beregne konsekvenser for dødelighet på bestandsnivå. På bakgrunn av det har vi vurdert totale konsekvenser for fiske og fiskeressursene. Dette danner så utgangspunkt for tilrådinger om reviderte forvaltningsmessige tiltak.

Emneord - norsk:
1. Seismikk
2. Effekter på fisk
3. Konsekvenser

Emneord - engelsk:
1. Seismics
2. Impacts on fish
3. Consequences

SAMMENDRAG

Hensikten med denne rapporten er å oppsummere våre kunnskaper om effekter på fisk fra luftkanonskytning og å vurdere konsekvenser av slike for fiske og fiskeressursene. Dette kan så danne basis for reviderte forvaltningsmessige tiltak for å redusere eventuelle negative effekter av seismiske undersøkelser.

Seismiske undersøkelser kan virke inn på enkeltfisk, bestander og fiskerier enten gjennom direkte fysiologiske skader eller gjennom atferdspåvirkninger. De fysiologiske effektene gjør seg først og fremst gjeldende på de unge stadiene i fiskens liv som egg, larver og yngel. For fisk på senere stadier og for voksen fisk regner en effekter av atferdspåvirkningen som mest betydningsfulle.

Under naturlige forhold hører fisk lyden fra luftkanoner på lang avstand og voksen fisk vil unnvike lydkilden. Fisken oppfatter både styrke og retning av lyden som produseres av luftkanoner, der frekvensspekteret, 10-700 Hz, er sammenfallende med det mest følsomme området for fiskens hørsel; 20-700 Hz. Fiskens høreevne tilsier at den kan oppfatte lyden fra et fullskala luftkanonfelt på over 100 km avstand.

Norske og amerikanske forsøk har vist at skremming av fisk med luftkanonskytning kan medføre fangstreduksjoner i omkringliggende områder. Trålfangster av torsk og hyse ble påvist redusert ut til 10 nautiske mil fra det seismiske skyteområdet. I gjennomsnitt for et undersøkelsesområde på 40x40 nautiske mil blev fangstraten halvert kort tid etter at skytningen hadde startet. Fangstreduksjonen for trål var størst sentralt inne i skyteområdet der mengden av begge arter blev redusert med omlag 70% under skytingen. Reduksjonen i fangstratene for line var i middel noe mindre, 44-50%, inne i det seismiske skyteområdet med en gradvis mindre påvirkning ut mot ytterkanten av undersøkelsesområdet.

Forsøk utenfor kysten av California viste at fangstraten for ulike arter på lineredskab i undersøkelsesområdet blev redusert til det halve under påvirkning av en enkel stor luftkanon. Fangstreduksjoner under vanlig trål- og linefiske i områder med seismiske undersøkelser med luftkanoner er også påvist. Forsøk har vist at sild reagerte retningsbestemt og svømte bort fra luftkanonposisjonene. Pelagiske arter som sild og brisling har bedre hørsel enn torsk og hyse og regnes å ha mer markant fluktrespons enn torskefisk. Tilsvarend skremmeffekter er derfor å forvente for disse pelagiske artene.

Fisk på gytefelt eller under vandring til gytefelt vil sannsynlig unnvike seismisk lyd i tilnærmet samme grad som annen voksen fisk. Dersom vi i aktuella områder krever at lydnivået fra seismisk skyting skal være lik eller lavera enn det støynivået en har i området fra fartøy i aktivt fiske, må avstanden mellom et seismisk skyteområde og et gytefelt eller viktige gytevandringsveier være 50 km eller mer.

Inntil 1990 var det utført forskning i et noe avgrenset omfang i Sovjet, Norge og USA for å belyse og kartlegge skadeomfang og -type fra luftkanoneksponering av fisk. For å supplere tidligera frankomne resultater og for å kunne belyse skadeomfang og -type for egg, larver og yngel, gjennomførte en ved Havforskningsinstituttet i perioden 1991-92 og i 1995 studier av effekter av luftkanonskyting på unge stadier av fisk.

Resultatene av undersøkelsene utført i 1991-1992 bekreftet tidligere undersøkelser angående dødelighet. For fiskeegg er det påvist øket dødelighet ut til omfag 5 m avstand fra luftkanonene. For plommesekklarver, er det særlig for piggvar funnet høj dødelighet, 40-50%, ut til avstander 2-3 m Lavere dødelighet er påvist for ansjos ved samme avstander. For senere studier som larver, postlarver og yngel er det funnet størst dødelighet, 10-20%, for rødspettelarver ut til 2 m avstand. Øket dødelighet ble også påvist for torskelarver ut til 5 m. På postlarvestadiet er det påvist dødelighet i 1-2 m avstand for flere arter, og det samme gjelder for torskeyngel. Andre påvist effekter var endringer i flyteevne og oppdrift, i evne til å unnvike predatorer og effekter som påvirker larvenes kondisjon og evne til å overleve. Oppsummert viser forsøkene at dødeligeт og skader fra luftkanoner er begrenset til avstander mindre enn 5 m fra luftkanonene, med størst skadeomfang ved avstander mindre enn 1,5 m.

På grunnlag av resultatene for dødelighetsavstander og -rater for larver og yngel, et typisk luftkanonoppsett og 3D-undersøkelsesprogram samt fordelingsmønstre for larver og yngel, blev det utført beregninger av hvor stor dødelighet en typisk seismisk undersøkelse kan påføre en larvebestand.

Vurderingen tok utgangspunkt i en valgt verste-tilfelle-vurdering, som så blev modifisert ut fra sannsynlighets- og forventningsverdibetraktninger. Verste-tilfelle-verdi ble angitt som høyeste verdi for hver parameter. Ved å bruke disse verdiene blev andelen larver, M, av en larvebestand som kan bli drept i løet av en typisk seismisk undersøkelse, beregnet til M = 0,45%. Ved å beregne en "realistisk forventningsverdi" til hver av parametrene antok en at dette representerte det som i gjennomsnitt kunne bli drept under en typisk 3D-undersøkelse. Resultatet av denne beregningen var at 0,3% av larvebestanden kunne bli drept under en undersøkelse. Blir amme larvebestand utsatt for flere undersøkelser, vil denne effekten summere seg opp for hver undersøkelse. Så lave dødelighetstall kan likevel regnes som ubetydelige i rekrutterings sammenheng for en fiskebestand.

Konklusjonene bli da:
Skytning med luftkanoner må frarådes i områder der det foregår fiskerier for å unngå eventuelle økonomiske tap for fiskere. Ordinære 2D - og 3D- undersøkelser bør unngåes i avstander nærmere enn 50 km fra yttergrensene av de kjente fiskefeltene. Restriksjonene bør gjelde minst en uke før fisket forventes å starte.

Av gytesikringshensyn og føre-var-prinsippet bør en skjerme gytefelt i gyteperioder og spesielle gytevandringsområder for seismisk skyting for arter med konsentrerte gytefelt og vandringsruter. Ved ordinære 2D- og 3D-undersøkelser bør skyting frarådes i avstander nærmere en 50 km fra yttergrensene av slike områder. Ved borestedsundersøkelser o.l. der en bruker små luftkanonoppset, kan det tillates å gå nærmere, men ikke inn i selve gytefeltet.

En trenger ikke legge restriksjoner på seismiske undersøkelser utfra skadeomfanget på fiskeegg, larver og yngel.

PROSJEKTRAPPORT

ISSN 0071-5638

HAVFORSKNINGSINSTITUTTET
MILJØ - RESSURS - HAVBRUK

Postboks 1870 5024 Bergen
Tlf.: 55 23 85 00 Fax: 55 23 85 31

Forskningsstasjonen	Austevoll	Matre
Flødevigen	Havbruksstasjon	Havbruksstasjon
4817 His	5392 Storebø	5198 Matredal
Tlf.: 37 01 05 80	Tlf.: 56 18 03 42	Tlf.: 56 36 60 40
Fax: 37 01 05 15	Fax: 56 18 03 98	Fax: 56 36 61 43

Distribusjon:
ÅPEN

HI-prosjektnr.:
10.06.1

Oppdragsgiver(e):
Fiskeridepartementet
HI

Oppdragsgivers referanse:

Rapport:
FISKEN OG HAVET NR. 8 - 1995

Tittel:
SEISMISKE UNDERSØKELSER OG SKADER PÅ FISKEEGG OG -LARVER
En vurdering av mulige effekter på bestandsnivå.

Forfatter(e):
Roald Sætre og Egil Ona

Senter:
Marint miljø

Seksjon:
Fysisk oseanografi og akustikk

Antall sider, vedlegg inkl.:
25 inkl. vedlegg

Dato:
19.04.1996

Sammendrag:

Denne rapporten belyser i hvilken grad skader på egg- og larvestadiet av seismiske undersøkelser vil kunne gi målbare effekter på bestandsnivå hos fisk. Ut fra en verste tilfelle betraktning vil en typisk seismisk undersøkelse maksimalt kunne drepe ned 0.45 % av en larvebestand. Det er også beregnet en "realistisk forventningsverdi" for mulige skader. Denne reflekterer det man i gjennomsnitt ville forvente ble neddrept. I en slik vurdering finner en at 0.3 promille av larvebestanden vil kunne dø som følge av en typisk 3D seismisk undersøkelse. De forventede dødelighetsratene en larvebestand kan påføres av en seismisk undersøkelse, er så lave i forhold til de naturlige, at virkningen på bestandsnivå må ansees som ubetydelig. Det er derfor ingen grunn til å legge restriksjoner på seismiske undersøkelser ut fra hensyn til skader på fiskeegg, - larver og yngel.

Emneord - norsk:
1. Seismisk skyting
2. Fiskeegg og -larver
3. Rekruttering

Emneord - engelsk:
1. Seismic surveys
2. Fish eggs and larvae
3. Recruitment

SAMMENDRAG

Siden tidlig på 60-tallet har det vært utført seismisk skyting på den norske kontinentalsokkelen for å kartlegge olje- og gassressursene. Seismiske undersøkelser kan skade de unge stadiene i fiskens liv hvor organismene har begrensede muligheter for å flykte unna. Undersøkelser har dokumentert at i nærsonen rundt en luftkanon kan en drepe ned vesentlige mengder av egg, larver og yngel. Det er allikevel fortsatt uklart om slike skader på individnivå har noen betydning for en rekruttering til bestanden. Hensikten med denne rapporten er derfor å belyse i hvilken grad skader på egg- og larvestadiet av seismiske undersøkelser vil kunne gi målbare effekter på bestandnivå hos fisk. I en etterfølgende rapport vil det bli gjort en mer fullstendig konsekvensvurdering når det gjelder effekten av seismiske undersøkelser på fisk og fiskerier.

Det er vanskelig å foreta en konsekvensvurdering av seismiske undersøkelser på bestandsnivå basert på en nøyaktig beskrivelse av skaderisikofordelingen. Til det er det for store mangler i de basiskunnskaper som må inngå. Denne rapporten tar derfor utgangspunkt i en verste tilfelle betraktning, der vi prøver å tallfeste hvor stor andel av en larvebestand som i verste tilfelle kan bli drept av en typisk 3D seismisk undersøkelse.

Videre er det forsøkt å anslå en mer realistisk verdi for hvor stor andel av bestanden som i middel kan bli drept av en seismisk undersøkelse.

Den andelen M av en total larvepopulasjon som vil dø, som følge av en seismisk undersøkelse kan utrykkes ved hjelp av følgende enkle ligning:

$M = p_1 \cdot p_2 \cdot p_3 \cdot p_4$.

hvor

p_1 = arealmessig belastningsgrad dvs. den andel av det seismiske undersøkelsesarealet som klassifiseres som risikoareal for fiskelarver.

p_2 = andel av kanonfeltets risikovolumen som må karakteriseres som død/skadevolum.

p_3 = andel av fiskelarvenes totale utbredelsesareal som berøres av de seismiske undersøkelsene.

p_4 = graden av overlapping mellom risikovolum og fiskelarvenes vertikalfordeling.

Ut fra de vurderinger som er gjort i denne rapporten vil de enkelte forholdene p_1 til p_4 ha følgende sannsynlige variasjonsområder:

$0.1 < p_1 < 0.3$
$0.1 < p_2 < 0.3$
$0 \leq p_3 < 0.1$
$0.2 < p_4 < 0.5$

Her har vi lagt til grunn følgende antagelser: Dødelighetsradius for luftkanonene, r = 2 m, avstanden mellom kurslinjene i den seismiske undersøkelsen, L = 100 m, og dødelighetsvolumet er sylindrisk til overflaten. Bruker man de maksimale tallen for de enkelte forholdene får en at M = 0.0045. Dette betyr at en typisk seismisk undersøkelse maksimalt kan drepe ned 0.45% av en larvepopulasjon under ugunstige omstendigheter.

I tillegg til en slikt verste tilfelle verdi forsøker rapporten også å gi en "realistisk forventningsverdi" til hver enkel av parametrene p_1 til p_4. Dette vil reflektere det vi i gjennomsnitt ville forvente ble neddrept av en

seismisk undersøkelse. Ut fra en slik vurdering vil 0.3 promille av larvepopulasjonen kunne dø som følge av en typisk 3D seismisk undersøkelse.

De forventede daglige dødelighetsrater som kan påføres av en seismisk undersøkelse er så lave i forhold til de naturlige dødelighetsrater i en larvepopulasjon, at virkningen på bestandsnivå må ansees som ubetydelig. Det er derfor ingen grunn til å legge restriksjoner på seismiske undersøkelser ut fra hensyn til skader på fiskeegg, -larver og yngel.

1. INNLEDNING

Siden tidlig på 60-tallet har det vært utført seismisk skyting med luftkanoner på den norske kontinentalsokkelen for å kartlegge olje- og gassressursene. Omfanget av denne aktiviteten har vært sterkt økende. I 1974 ble det »skutt« ca. 40.000 linjekilometer mens en i de siste årene har vært oppe i over 300.000. I tillegg til at innsatsen på de tradisjonelle leteområdene i Nordsjøen har økt, er letearealet betydelig utvidet i og med at områdene nord for 62° N i sterkere grad er kommet med. Når leteområdene utvides og leteintensiteten økes, blir stadig flere av våre viktigste fiskefelt utsatt for seismiske undersøkelser, og skytevirksomheten kommer ofte i konflikt med fisket.

Seismiske undersøkelser kan virke inn på enkelt-fisk, bestander og fiskerier enten gjennom direkte fysiologiske effekter eller gjennom adferdsendringer. De fysiologiske effektene gjør seg først og fremst gjeldene på de unge stadiene i fiskens liv som egg, larver og yngel som har begrensede muligheter for å flykte unna. Man deler ofte disse effektene opp i

- øyeblikkelig dødelighet
- dødelighet over tid
- ikke dødelige skader

En seismisk undersøkelse til havs kan utføres som en 3-dimensjonal undersøkelse (3D) med meget kort avstand mellom kurslinjene eller som en 2-dimensjonal undersøkelse (2D) med mindre tette kurslinjer. Et seismikkfartøy som utfører 3D undersøkelser, sleper etter seg ett luftkanonfelt som består av 20-60 luftkanoner av ulike størrelser, og en eller flere hydrofonkabler. Fartøyets kurslinjer kan ha en typisk avstand på 50 til 500 m, farten er 4-5 knop, og kanonene avfyres med tidsintervaller mellom 7 til 20 s. Ved 2D undersøkelser er kurslinjeavstandene større, mellom 0,5 og 10 km, mens de øvrige parametre kan være som for 3D-undersøkelser (DALEN 1994).

Antall linjekilometer skutt kan imidlertid være like i de to kartleggingsmåtene, mens belastning pr. arealenhet er vesentlig lavere for 2D undersøkelser. Dersom utbredelsesområdet for larver er lite til en 3D undersøkelse med høy arealmessig belastningsgrad, kunne være mer skadelig for larvebestanden. Vi har derfor benyttet en slik undersøkelse som bakgrunn for denne vurderingen.

Siden slutten av 80-årene har det vært en utvikling mot såkalte dobbelkildeoppsett og fra 1992 har også trippelkildeoppsett vært i bruk. Et dobbeltkildeoppsett består av et fartøy som har to luftkanonfelt: ett på hver side av fartøyets lengdemidtlinje. Et trippelkildeoppsett er et fartøy som har tre luftkanonfelt: ett langs fartøyets lengdemidtlinje og ett på hver side av denne. Ved flerkildeoppsett vil disse bli avfyrt vekselvis (DALEN 1994).

FISKEN OG HAVET, NR. 3 – 1993
ISSN 0071-5638

EFFEKTER AV SEISMISK SKYTING PÅ FANGST OG FANGSTTILGJENGELIGHET AV TORSK OG HYSE

Av
Arill Engås, Svein Løkkeborg, Egil Ona og Aud Vold Soldal

HAVFORSKNINGSINSTITUTTET

SAMMENDRAG

I mai 1992 ble det på Nordkappbanken, Barentshavet, gjennomført fiskeforsøk med trål og line og akustisk kartlegging av fiskefordelingen før, under og etter seismisk aktivitet for å finne svar på følgende problemstillinger:

1) Har seismisk luftkanonskyting effekt på fangst og fangsttilgjengelighet av torsk og hyse?
2) Hvor langt fra det seimiske området kan en påvise en eventuell effekt?
3) Hvor lenge etter endt seismisk aktivitet kan en påvise en eventuell effekt?

Fiskeforsøkene ble gjennomført med en tråler og et autolinefartøy innenfor et område på 40x40 nautiske mil (nm) før (7 døgn), under (5 døgn) og etter (5 døgn) seismisk aktivitet. Begge fartøyene benyttet kommersielle fiskeredskaper. Totalt ble det gjennomført 62, 67 og 60 trålhal, henholdsvis før, under og etter seismisk aktivitet. Trålhalene ble fordelt på fire avstander fra det seismiske skyteområdet: 1) Innenfor skytefeltet; 2) 1-3 nm fra skytefeltet; 3) 7-9 nm fra skytefeltet; og 4) 16-18 nm fra skytefeltet. Linestubbene ble satt i fire tilsvarende posisjoner i forhold til skytefeltet. Totalt ble det halt 56, 40 og 35 linestubber, henholdsvis før, under og etter seismisk aktivitet.

Innenfor samme område og tidsperiode ble det også gjennomført akustisk kartlegging av fiskefordeling og mengde fisk med en annen tråler. Den akustiske kartleggingen ble gjennomført ved at en krysset gjennom skyteområdet på kurslinjer ut til 20 nm. I tillegg ble det gjennomført detaljert kartlegging innenfor skyteområdet før og under sismisk aktiviet. Det ble tatt prøver av den akustisk registerte fisken med en standard prøvetakingstrål.

Den seismiske luftkanonskytingen (5 døgn) blev gjennomført innenfor et område på 3x10 nm i sentrum av området der fiskeforsøkene ble gjennomført. Riggingen av kanonfeltet og den praktiske gjennomføringen av skytingen ble gjennomført etter samme retningslinjer som under normale 3-dimensjonale tokt for oljeindustrien.

Den akustiske kartleggingen og fangstforsøkene med trål og line på Nordkappbanken viser at seismisk skyting med luftkanoner virker inn på fiskefordeling og fangstrater for torsk og hyse, ikke bare lokalt innenfor området der skytingen foregikk, men også i betydelige områder omkring.

Fangstene i trål og på line bestod i all hovedsak av torsk og hyse, med torsk som den dominerende arten. Fangstratene både for torsk og hyse i trål gikk ned innefor hele undersøkelsesområdet ut til ytterkantene 18 nm fra skytefeltet. I gjennomsnitt for hele området sett under ett, ble fangstraten halvert da skytingen tok til. Størst var reduksjonen i sentrum, d.v.s. inne i det seismiske skytefeltet. Her blev gjennomsnittsfangsten for begge arter redusert med ca. 70% under skyting. Reduksjonen i trålfangstene var stort sett i overensstemmelse med de akustiske observasjonene, som viste en reduksjon på ca. 45% i totalmengden av torsk og hyse innenfor undersøkelsesområdet. Reduksjonen i akustisk mengde var også størst i sentralområdet.


Reduksjonen i fangstratene for torsk på line var lavere enn for trål. Nedgangen var på 44% inne i det seismiske område, med en gradvis mindre påvirkning av fangstene ut mot ytterkanten av feltet. På de linestubbene som ble satt lengst borte fra skytefeltet (16-18 nm) ble det ikke påvist noen nedgang i fangstratene for torsk. For hyse ble det påvist en vektreduksjon pr. stubb på ca. 50% over hele undersøkelsesområdet.

Både i trål- og linefangstene og i de akustiske mengdelålingene ble det funnet en relativt sterkere reduksjon i stor (> 60 cm) enn i liten (< 60 cm) fisk. Imidlertid ble også antallet småfisk redusert med ett unntak: mengden av små torsk økte i linefangstene under skyting.

Verken den akustiske kartleggingen eller trålforsøkene viste at mengde av torsk og hyse økte i 5 døgn etter

endte seismisk aktivitet. Det ble imidlertid påvist en endring i lengdefordelingen i trålfangstene imot tilstanden før skyting. På line ble det observert en økning i torskefangstene i slutten av forsøksperioden, men ikke i hysefangstene.

RED: 10 X



Nasjonalbibliotek


Nasjonalbiblioteket


National Library of Norway

Rana Division


N-8607 Mo i Rana

Telephone: +47 75 12 11 11 Telefax: +47 75 12 12 2





RED: 10 X



Nasjonalbibliotek

Nasjonalbiblioteket

National Library of Norway

Rana Division

N-8607 Mo i Rana

Telephone: +47 75 12 11 11 Telefax: +47 75 12 12 2

LØGTINGS-TIDINDI

1997

Løgtingstíðindi 1997

Løgtingstíðindi 1997

(Bind 2)

Føroya løgting

Løgtingstíðindi 1997
© Føroya løgting
Fyriskipað av løgtingsskrivstovuni
Umbróting og prenting: Dimmalætting
Innbinding: Helge Justinussen

FISKEN OG HAVET, NR. 4 – 1993
ISSN 0071-5638

SEISMISK AKTIVITET OG FISKEFANGSTER
Analyse av innsamlede fangstdata

Av
Aud Volt Soldal og Svein Løkkeborg

HAVFORSKNINGSINSTITUTTET

SAMMENDRAG

Det er samlet inn fangstdata fra kommersielle fiskefartøyer som har fisket i områder hvor det samtidig har foregått seismisk skyting med luftkanoner. Opplysningene fra fiskefartøyene er relatert til posisjon for de seismiske linjene som er skutt og tidspunkt for skyting. Data fra tre ulike fiskerier er analysert: Vinterfisket etter torsk med line utenfor Finmark, ferskfisketråling på Storegga og reketråling i Barentshavet.

Fra vintertorskefisket med line er det samlet inn fangstdata fra fire autolinebåter. Der ble funnet en reduksjon i linefangstene av torsk *(Gadus morhua)* fra 55 til 80% for stubber som var satt nær ved de seismiske linjene. Fangstene ble redusert ut til en avstand på minst 5 nautiske mil.

Fangstdata fra seks ferskfisktrålere på Storegga viste at fangstene av sei *(Pollachius virens)* gikk ned med i gjennomsnitt 33% under kortvarig seismisk skyting i april 1991. Fangstene fortsatte å synke i to døgn etter at skytingen opphørte. En tilsvarende analyse fra samme område i juni, da et større skyteprogram blev gjennomført, viste ikke reduksjon i seifangstene. Bifangsten av torsk økte til omtrent det tre-doble under den kortvarige skytingen i april. Etter få timer var imidlertid fangstratene tilbake til nivået før skyting.

Fangsdata fra to reketrålere som fisket i Barentshavet er analysert. Det ene fartøyet hadde en økning i fangstene av reke *(Pandalus borealis)* på nærmere 60% da skytingen tok til, mens det ikke ble observert noen forandring i rekefangstene på det andre. Det ble heller ikke funnet noen endring i bifangsten av blåkveite *(Reinhardtius hippoglossoides)* da skytingen startet. Imidlertid ble bifangsten av torsk kraftig redusert på begge fartøyer (80-85%).

Det ble konkludert med at fangstratene i ulike fiskerier ser ut til å bli påvirket av seismisk aktivitet. Retningen og graden av påvirkning er svært forskjellig i ulike fiskerier og for ulike arter. Analyser av innsamlede fangstdata fra kommersielle fartøyer har mange svakheter fordi en ikke har kontroll over forsøksbetingelsene. Sikrere konklusjoner om hvordan seismisk aktivitet påvirker fiskefangster kan bare trekkes etter at kontrollerte feltforsøk er gjennomført.

Skjal 2

Viðvíkjandi kolvetnislógini
Formaðurin í vinnunevndini hevur heitt á Løgtingsskrivstovuna um at kanna, hvørjir møguleikar eru í stýrisskipanini tyri, at løgtingssins ávirkan á útinningina av kolvetnislógini verður styrkt.

Viðlagt er upprit frá Sjúrði Rasmussen, løgfrøðingi, ið viðgerð spurningin.

Niðurstøðan í uppritinum er hendan:

At ítøkiligu møguleikarnir sambært stýrisskipanarlógini eru:
a) **Løgtingslóg.** Sett verður í kolvetnislógina, at ávísar almennar reglur verða givnar við løgtingslóg, ella at ávísar avgerðir, sum ein ikki metir sum so ógvuliga ítøkiligar avgerðir, verða tiknar við løgtingslóg.
b) **Frágreiðing við freist.** Sett verður í kolvetnislógina, at landsstýrið, í góðari tíð framman undan, hevur skyldu at upplýsa løgtingið um, hvørjar kunngerðir tað fer at gera við heimild í lóg, ella hvørjar ítøkiligar fyrisitingarligar avgerðir tað fer at taka, áðrenn avgerðin er løgfrøðiliga bindandi.

Spurningurin um avgerð kann takast við løgtingssamtykt ella løgtingsnevndarsamtykt
Sambært stýrisskipanarlógini § 1 ber ikki til at áseta í kolvetnislógini, at ávísar almennar reglur ella ítøkiligar avgerðir eftir lógini verða givnar við løgtingssamtykt ella við løgtingsnevndarsamtykt, antin í bindandi ella óbindandi formi.

Spurningurin um avgerð kann góðkennast við løgtingssamtykt ella løgtingsnevndarsamtykt
Sambært stýrisskipanarlógini § 34, 2. pkt. ber ikki til at áseta í kolvetnislógini, at ávísar almennar reglur eftir lógini verða tiknar av landsstýrinum og treytað heimildina av, at reglurnar verða góðkendar við løgtingssamtykt ella løgtingsnevndarsamtykt í bindandi formi, áðrenn tær fáa gildi. Sambært stýrisskipanarlógini § 34, 2. pkt. til javnd0mis, og sambært tingskipanini § 24, stk. 3 er tað sama galdandi fyri løgtingssamtykt ella løgtingsnevndarsamtykt í óbindandi formi.

Sambært stýrisskipanarlógini § 1 ber ikki til at áseta í kolvetnislógini, at ítøkiligar avgerðir eftir lógini verða tiknar av landsstýrinum, og treytað heimildina av, at avgerðir verða góðkendar við løgtingssamtykt ella løgtingsnevndarsamtykt í bindandi formi, áðrenn tær fáa gildi. Sambært stýrisskipanarlógini § 34, 2. pkt. til javndømis, og sambært tingskipanini § 24, stk. 3 er tað sama galdandi fyri løgtingssamtykt ella løgtingsnevndarsamtykt í óbindandi formi.

Frágreiðing til løgtingsnevnd
Tað er finóti reglunum í tingskipanini § 24, stk. 3, at landsstýrið fær skyldu til at leggja fram avgerðir, almennar ella ítøkiligar, fyri løgtingsnevnd til kunningar, áðrenn avgerðin verður fráboðað rætta viðkomandi. Niðurstøðan er sostatt tann, at einki formelt er til hindurs fyri at útbjóðing sambært § 7 í kolvetnislógini og útbygging sambært § 14 í kolvetnislógini verður heimilað sambært serligari løgtingslóg, men at ansast skal eftir, at lógirnar ikki koma ov nær inn á ávís ítøkilig viðurskifti.

Í viðmerkingunum til uppskotið til kolvetnislóg verður skrivað, at (síða 1, pkt. c) "Mannagongdin í sambandi við fyriskipan av útbjóðingarumførum og veiting av loyvum at leita eftir og framleiða olju og jarðgass hevur alstóran týdning." og at (síða 25) tað kundi "verið serstakliga ógagnligt, um landsstýrið hevði verið løgfrøðiliga bundið í samráðingum við umsøkjandi oljufelløg at ganga undir treytir, ið løgtingið hevði sett landsstýrinum fyri at góðkenna frágreiðingina, og sum kanska vóru ógvuliga nágreiniligar." Hetta sama má verða galdandi fyri treytir, ið verða ásettar í eini løgtingslóg.

Heldur einki er til hindurs fyri, at sett verður ein tíðarfreist á, nær frágreiðing skal verða løgd fyri tingið, innan útbjóðing kann fara fram, ella útbyggingarloyvið verður givið.

Broytingaruppskot, ið setir krav um, at útbjóðing og útbygging verður heimilað sambært serligari løgtingslóg, kundi verðið orðað soleiðis:

Herálvur Joensen ger uppskot.

Broytingaruppskot, ið serir tíðarfreist á, nær frágreiðingin skal verða løgd fyri tingið, innan útbjóðing fer fram, ella útbyggingarloyvi verður givið, kundi verðið orðað soleiðis:

Herálvur Joensen ger uppskot.

Skjal 3

Løgtingsins møguleikar fyri ávirkan á útinningina av kolvetnislógini

Í sambond við viðgerðini av løgtingsmáli nr. 31/1997, uppskot til løgtingslóg um kolvetnisvirksemi, hevur formaðurin í vinnunevndini, Jørgen Niclasen, løgtingsmaður, biðið um eina útgreining av spurninginum um, í hvønn mun stýrisskipanarlógin loyvir, at løgtingið ella løgtingsnevndir koma inn í myndina í útinningini av størvunum hjá almennum myndugleikum, sum lógin setir upp, tað verði seg reglufyriskipandi heimildir ella fyrisitingarligar heimildir. Serliga verður hugsað um § 6, har landsstýrið fær heimild til at veita loyvi við einkarrætti til leiting eftir og framleiðslu av kolvetnum á neyvt ásettum økjum við gjølla ásettum treytum, eftir at lýst hevur verið eftir umsóknum sbr. § 7, og eisini verður serliga hugsað um § 14, har ásett er, at leiðbyggjaellan loyvishavarans at stovna havstøð ella virki og útbúnað á landi at brúka til kolvetnisframleiðslu og at fara undir framleiðslu, krevur góðkenning landsstýrisins.

Hesir *teoretisku* møguleikarnir eru fyri, at løgtingið kemur inn í myndina:

1) Ásett verður í lógini, at ávísar almennar reglur ella ítøkiligar avgerðir eftir lógini verða givnar við løgtingslóg
2) Ásett verður í lógini, at ávísar almennar reglur ella ítøkiligar avgerðir eftir lógini verða givnar við løglingssamtykt ella við løgtingsnevndarsamtykt, antin í bindandi ella óbindandi formi
3) Ásett verður í lógini, at ávísar almennar reglur ella ítøkiligar avgerðir eftir lógini verða liknar av landsstýrinum, men at avgerð landsstýrisins er treytað av, at hon, áðrenn hon fær gildi við løgtingssamtykt ella løgtingsnevndarsamtykt, antin í bindandi ella óbindandi formi verður góðkend.
4) At landsstýrið fær skyldu til at leggja fram avgerðir, almennar ella ítøkiligar, fyri løgtingið ella løgtingsnevnd til kunningar, áðrenn avgerðin verður fráboðað rætta viðkomandi.

Ad 1) Løgtingslóg

At almennar reglur skulu gevast við løgtingslóg, er júst tað, sum ætlanin er við løgtingslógum. Fólksins umboðsmenn skulu sjálvir áseta tær almennu reglurnar, sum galda skulu, saman við løgmanni eftir stýrisskipanarlógini § 1. Einasta, teir í hesi regluásetan skulu virða, er grundlóg ríkisins, heimastýrislógina og stýrisskipanarlógina. Haraftrat skulu teir halda seg innan teir karmar, sum millumtjóðasáttmálar seta sbr. stýrisskipanarlógini.

At gera løgtingslógir so ítøkiligar, at tær næstan kunnu sigast at vera fyrisitingarligar avgerðir er eftir stýrisskipanarlógini § 1 ikki loyvt, av tí at stýrisskipanarlógin leggur allar fyrisitingarligar heimildir til landsstýrið. Hinvegin er tað lóggávuvaldið sjálvt, sum tulkar, nær nakað er so ítøkiligt, at tað má sigast at vera fyrisitingarligt, og nær tað ikki er tað, men er ein lóggávuspurningur. Formelt er stýrisskipanarlógin tí ofta ein forðing fyri, at nøkur ítøkilig viðurskifti verða ásett við løgtingslóg, men í verki skal helst verða talan um ógvuliga ítøkilig mál, fyrrenn man kann fara so langt sum at siga, at § 1 er ein forðing fyri slíkari lóggávu. Tí má løgfrøðilig støða takast til slík mál mál fyri mál.

Ad 2) Løgtingssamtykt

At tað verður ásett í løgtingslóg, at heimild verður givin løgtinginum' at gera almennar reglur, ber ikki til.

Eftir § 1 í stýrisskipanarlógini er lóggávuvaldið, t.v.s. heimildin at skriva út almennar reglur, hjá løgtinginum og løgmanni í felag, men eftir § 34 er § 1 ikki ein forðing fyri, at henda heimild í nærri ásettan mun verður løgd landsstýrinum. Frá hesum reglum mugu vit taka øvugdømi (modsætningsslutning). Tað ber ikki til at leggja heimild til løgtingið einsamalt at gera nærri reglur.

Í § 1 í stýrisskipanarlógini er ásett, at útinnandi valdið er hjá landsstýrinum. Um hetta siga viðmerkingarnar til stýrisskipanarlógina: "Soleiðis kann ein framferð, sum sbr. løgtingslóg krevur loyvi, bert fara fram, um útinnandi valdið hevur veitt loyvið". Víðari verður sagt: "Útinnandi valdið er landsstýrið og bert landsstýrið. Greinin er tó ikki til hindurs fyri, at fyrisitingarligar heimildir verða lagdar slíkum ráðum og nevndum, sum umrøddar og heimilaðar eru eftir § 36 (§ 35 í samtyktu lógini)". Hugsað vit so um, at tað í lógina skal standa, at løgtingið skal taka ávísar fyrisitingarligar avgerðir sbr. kolvetnislógini, so vil hetta ganga ímóti stýrisskipanarlógini. Heimildin skal verða hjá landsstýrinum ella hjá serligari fyrisitingarnevnd, sbr. § 35, sum løgtingið ikki kann velja nevndarlimir í.

Ad 3) Avgerð landsstýrisins treytað av løgtingssamtykt

Tað, at ásett verður í kolvetnislógini, at heimild landsstýrisins at skriva út almennar reglur í kunngerð, er treytað av antin løgtingssamtykt, ella løgtingssamtykt gongur ímóti stýrisskipanarlógini § 34 2. pkt. Somuleiðis gongur ein heimild í kolvetnislógini, sum sigur, at ein fyrisitingarlig avgerð krevur góðkenning frá løgtinginum ella løgtingsnevnd, eisini ímóti stýrisskipanarlógini § 1. Fyrisitingarheimildin liggur hjá landsstýrinum og bara landsstýrinum eftir § 1, og kann ikki treytast av góðkenning frá øðrum.

Spurningurin er so: Ber til í kolvetnislógini at áseta, at ein heimild at skriva út almennar reglur ella ein heimild at taka fyrisitingarligar avgerðir er treytað av, at løgtingið ella løgtingsnevnd óbindandi frammanundan hevur sagt sína hugsan um málið. Hertil er at siga, at hetta loyvir stýrisskipanarlógin heldur ikki. Hetta fer at føra við sær, at samtykki í royndi og veru krevst, og hetta gongur ímóti stýrisskipanarlógini sbr. tí, sum frammanfyri er nevnt. Harumframt má havast fyri eyga, at grundregla er í tingskipanini § 24 stk. 3 um, at nevndirnar eru hjálpiarnboð hjá tinginum og hava ikki eksternar uppgávur. Tær vendla sær við ráðum til tingið og ikki aðrar vegir.

Ad 4) Kunning fyri løgtinginum áðrenn avgerð

Sbr. stýrisskipanarlógini § 29 stk. 2 og § 30 kann hvørki løgmaður ella landsstýrismaður sita í starvi, um so er, at meiri enn helmingurin av øllum tingmonnum atkvøður fyri misáliti á hann. Hetta er so einasti háttur tingsins at hava ávirkan á fyrisiting landsins, sum er óbeinleiðis. Tað vil tí eitki verða til hindurs fyri, at løgtingið tryggjar sær í lóggávuni, at løgtingið fær allar neyðugar upplýsingar, soleiðis at tað kann taka støðu til, um grundarlag er fyri misálitisrættinum. Men at upplýsingarskyldan skal verða mótvegis eini løgtingsnevnd, er ónáttúrligt. Nevndin skal ikki taka støðu til misálitisuppskotið. Tað er tingið, sum ger tað; eisini teir tingmenn, sum ikki sita í løgtingsnevndini. Hetta vil eisini ganga ímóti reglini í tingskipanini § 24 stk. 3 um, at løgtingsnevndirnar bert kunnu taka til viðgerðar tey mál, sum løgtingsformaðurin hevur beint teimum.

Ítøkiligu møguleikarnir eru sostatt hesir:

Ítøkiligu møguleikarnir sbr. stýrisskipanarlógini eru sostatt:

a) Sett verður í kolvetnislógina, at ávísar almennar reglur verða givnar við løgtingslóg, ella at ávísar avgerðir, sum ein ikki metir sum so ógvuliga ítøkiligar, verða liknar við løgtingslóg.
b) Sett verður í kolvetnislógina, at landsstýrið hevur skyldu at upplýsa løgtingið um, hvørjar kunngerðir tað fer at gera við heimild í lóg, ella hvørjar ítøkiligar fyrisitingarligar avgerðir tað fer at taka í góðari tíð, áðrenn avgerðin er løgfrøðiliga bindandi.

Á løgtingsskrivstovuni 23. januar 1998

Sjúrður Rasmussen, løgfr.

[1] Væl at merkja í forminum uppskot til samtyktar, og ikki í lógarformi, har løgtingið, eftir at hava havt uppskotið til viðgerðar á trimum viðgerðarstigum, samtykkir uppskotið, og løgmaður staðfestir og kunngerð løgtingslóg.

2. viðgerð hósdagin 19. februar 1998. Broytingaruppskot til §§ 1, 2, 3, 7, 9, 10, 13, 14, 20, 26, 36 og 42, nyggjar §§ 11 og 43 og nr. 16 og 17 í broytingaruppskotinum frá vinnunevndini samtykt 21-0-0. §§ 1, 2, 3, 7, 9, 10, 11, 13, 14, 20, 26, 36, 42 og 43 soleiðis broyttar samtykt 21-0-0. §§ 4, 5, 6, 8, 11, 12, 15, 16, 17, 18, 19, 21, 22, 23, 24, 25, 27, 28, 29, 30, 31, 32, 33, 34, 35, 37, 38, 39, 40, 41, 43 og 44 samtyktar 21-0-0. At uppskotið soleiðis samtykt kann fara til 3. viðgerð samtykt 21-0-0.

3. viðgerð týsdagin 24. februar 1998. Uppskotið sum samtykt við 2. viðgerð endaliga samtykt 26-0-0

Løgtingslóg nr. 31 frá 16. mars 1998
EL.j.nr. 140-9/93

32 Uppskot til løgtingslóg um umlegging av Telefonverki Føroya Løgtings til partafelag

Ár 1997, týsdagin 25. november legði Sámal Petur í Grund, landsstýrismaður, vegna landsstýrið, fram soljóðandi:

Uppskot
til
løgtingslóg um umlegging av Telefonverki Føroya Løgtings til partafelag

Endamál lógarinnar

§ 1. Endamál lógarinnar er at umskipa almenna stovnin Telefonverk Føroyu Løgtings til eitt partafelag.

Yvirtøka av ogn og skuld v.m

§ 2. Landsstýrismanninum er heimilað at stovna partafelag, P/F Telefonverkið, við gildi frá 1. januar 1998 og at leggja felagnum til alla ogn og skuld, rættindi og skuldbindingar hjá Telefonverki Føroya Løgtings.

Stk. 2. Við stovnan felagsins heldur virksemi Telefonverk Føroya Løgtings uppat.

Stovnan av felagi v.m

§ 3. Felagið verður stovnað við tí endamáli at hava í hondum og reka fjarskiftiskervi og fjarskiftistænastu umframt aðra vinnu, sum hevur samband við hetta virksemið.

Stk. 2. Partapeningurin verður við stovnan felagsins 75% av eginognini sambært grannskoðaðari byrjunarfíggjarstøðu og metingarfrágreiðing pr. 1. januar 1998, rundað til nærmasta 5 milliónir.

Stk. 3. Partapeningurin verður ogn landsins, og kunnu partabrøvini ikki avhendast, uttan løgtingið gevur samtykki til tess.

Skrásetingar- og tinglýsingargjøld

§ 4. Landsstýrið hevur skyldu til at undantaka partafelagið frá skrásetingargjaldi til Skráseting Føroya í sambandi við stovnan felagsins.

Stk. 2. Partafelagið er undantikið skylduni at rinda tinglýsingargjald fyri tinglýsing av ognarheimildum fyri fastar ognir, sum felagið yvirtekur við stovnanina.

Skattligar avleiðingar

§ 5. Byrjunarfíggjarstøða og metingarfrágreiðing, smb. § 3, stk. 2, verða óbroyttar at leggja til grund í skattleggingini av partafelagnum.

Gildiskoma v.m.

§ 6. Henda lóg kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd, og tann 1. januar 1998 fara úr gildi kunngerð nr. 10 frá 18.02.1987, reglugerð fyri Telefonverk Føroya Løgtings, løgtingslóg nr. 28 frá 22.05.1969 um áseting av telefongjøldum umframt tær kunngerðir, givnar við heimild í nevndu lóg, lóg nr. 110 af 30.05.1927 "om styrelsen af Post- og Telegrafvæsenet", sum broytt við løgtingslóg nr. 17 frá 31.03.1976 og "anordning nr. 156 af 07.04.1924 om telegrambesørgelse gennem telefon".

Almennar viðmerkingar

A. Galdandi lóggáva v.m.

Tann 1. juli 1997 kom í gildi nýggj fjarskiftislóg, løgtingslóg nr. 79 frá 23. mai 1997 um fjarskifti, sum m.a. hevði til endamáls at skapa fortreytir fyri frælsari kapping á fjarskiftisøkinum.

Arbeiðsbólkur við umboðum frá Føroya Landsstýri, telefonverkinum og yrkisfeløgunum varð settur at gera frágreiðing til Føroya Landsstýri um, hvussu telefonverkið átti at verið skipað í framtíðini.

Úrslitið av hesum var *Frágreiðing um umskipan av TFL til partafelag*, sum var latin úr hondum 26. juni 1997, og sum er løgd við sum Skjal 1.

Tilráðing teirra var henda:
Arbeiðsbólkurin heitir tí á Føroya Landsstýri um at skipa so fyri, at TFL skjótast til ber verður umskipað til eitt alment partafelag

Høvuðsendamálið við umleggingini til eitt partafelag er, at greiður skilnaður verður millum politisku ábyrgdina og dagligu leiðsluábyrgdina. Mett verður eisini, at rakstur í partafelagi fer at økja sniðleikan og avgerðarfrælsið soleiðis, at betri møguleikar verða fyri tillaging til økta kapping og skiftandi umstøður.

Aðrir møguleikar enn stovnan av partafelagi hava verið umhugsaðir, eitt nú sjálvsognarstovnur, vinnurekandi grunnur og almennur stovnur uttan fyri fíggjarætlanina. Víst verður til frágreiðingina, Skjal 1, síðu 14-15.

B. Stuttur samandráttur

Høvuðsinnihaldið í lógini er, at Telefonverk Føroya Løgtings verður umskipað frá einum almennum stovni til eitt partafelag, sum landið eigur allan partapeningin í. Hetta verður gjørt á tann hátt, at partafelagið yvirtekur alla ogn og skuld hjá TFL. Partafelagið verður stovnað við sonevndum apportinnskoti. Um slíka stovnan av partafelagi eru greiðar reglur í partafelagslógini, sum serliga tryggja ognarum og øðrum utanfyristandandi, at teir kunnu líta á fíggjarligu upplýsingarnar í stovningartilfarinum. Tí er krav um, at byrjunarfíggjarstøða sýnir veruligu virðini, og at gjørd verður ein metingartrágreiðing.

Stovningardagurin er 1. januar 1998 og fellur sostatt saman við endanum av roknskaparárinum hjá Telefonverkinum.
Fíggjarstøðan í roknskapinum, saman við byrjunarfíggjarstøðuni og metingartrágreiðingini, verða sostatt grundarlagið undir, hvussu stór eginogn felagsins er við stovnan.

Skotið verður upp, at 75% av eginognini verður partapeningur, meðan restin verður lív eginogn. Sum roknskapartilfarið vísir, svarar hetta til ein partapening uppá umr. kr. 75 mió.

Lógaruppskotið fevnir bert um tríggjar ásetingar, sum partafelagslógin annars fyriskipar, nevniliga
* navn,
* endamálsorðing og
* partapening.

Restina tekur aðalfundurin avgerð um, herundir samtykt av viðtøkum og broytingar av teimum. Tá lógin hevur ásett navn, endamál og reglur um, at partapeningurin ikki kann seljast, skulu viðtøkurnar gerast í neyvum samsvari við hetta, og kann aðalfundurin ikki broyta ásetingarnar í viðtøkunum um hesi viðurskifti.

Sum tað sæst, er í uppskotinum eingin áseting um leiðsluna av nýggja felagnum - nevnd og sjórn. Hetta eru viðurskifti, sum sambært partafelagslógini skulu skipast í viðtøkunum, og tað er aðalfundurin, sum avger innihaldið í viðtøkunum. Tað verður hildið óneyðugt í lógini at áseta reglur um tal og val av nevndarlimum.

Her skal viðmerkjast, at sambært partafelagslógini hevur starvsfólkið í nýggja felagnum rætt til at velja nevndarlimir.

C. Fíggjarligar avleiðingar
Lógaruppskotið hevur ikki eyka fyrisitingarligan kostnað við sær.

Inntøkur:
Inntøkur landskassans eftir umskipanina av TFL til alment partafelag fara at stava frá
0 loyvisgjaldi,
0 partafelagsskatti og
0 vinningsbýti.

Loyvisgjald:
Sambært lógini um fjarskifti kann landið áleggja loyvishavarum at gjalda loyvisgjald, sum er árligt gjald fyri rættin til at reka fjarskifti. Loyvisgjaldið verður sambært uppskoti til fíggjarløgtingslóg fyri 1998, smb. 4.38.3.05 komandi 2 árini kr. 2 mió. árliga.

Partafelagsskattur:
Umskipanin av TFL hevur við sær, at felagið kemur undir vanligan partafelagsskatt, sum í dag er 27% af skattskyldugu inntøkuni.

Ilt er at meta um, hvussu stórar skattainntøkurnar verða hvørt árið, tí tær eru beinleiðis tengdar at rakstrarligu gongdini, fløgum og skattligum avskrivingum.

Vinningsbýti:
Av tí at allur partapeningurin sambært uppskotinum er ogn landskassans, fellur møguligt vinningsbýti til landskassan. Ársaðalfundurin ger av støddina á vinningsbýtinum.

Útreiðslur:
Sum er, ábyrgist landskassin fyri øllum skyldum telefonverksins, meðan tað verður partafelagið sjálvt, sum ábyrgist fyri sína skuld eftir umleggingina. Hetta hevur sum meginreglu við sær, at landskassin ikki hevur nakrar útreiðslur av at Telefonverk Føroya Løgtings verður umskipað til partafelag. Tó er, sum uðtastaðni tilskilað, talan um, at landskassin framvegis hevur borgað fyri lánum telefonverksins mótvegis Nordisk Investeringsbank. Slík borgan kann hava við sær, at landskassin kann verða kravdur sum borgsmaður, um tað verður neyðugt við framhaldandi borgan eftir umleggingina. Sum víst á undir serligu viðmerkingunum, verður roknað við at sleppa landskassanum undan framhaldandi borgan.

Eftir meting leiðslunnar í TFL av gongdini komandi árini, skuldi eingin vandi verið fyri, at borgsskyldan verður effektiv.

D. Ummæli.
Sum tað sæst av hjálagda Skjali 1 (Frágreiðing frá 26. juni 1997), hava umboð fyri bæði leiðslu, starvsfólk og avvarðandi yrkisfeløg verið við í fyrireikingararbeiðinum til lógaruppskotið og hava einmælt latið tilráðing um, at TFL verður umskipað til partafelag.

Viðmerkingar til tær einstøku greinirnar
Til § 1.
Greinin sigur, at endamálið við lógini er at leggja Telefonverk Føroya Løgtings um til partafelag.

Til § 2, stk. 1.
Sum nevnt í almennu viðmerkingunum kann aðalfundurin ikki broyta navnið á partafelagnum, tí navnið er

ásett í lógini. Hinvegin er einki til hindurs fyri, at aðalfundurin samtykkir, at felagið fær sær ymisk undirnøvn, sum kunnu verða hent, serliga tá ræður um samskifti við útlond. Somuleiðis er felagnum loyvt at stovna dótturfeløg, treytað av at endamál teirra er innan lógarinnar karm.

Høvuðsinnihaldið er, at øll ogn og skuld TFL's verður flutt til partafelagið.

Tá tað ræður um ognir og rættindi, kunnu hesi flytast til partafelagið, uttan at skuldararnir hava givið teirra samtykki. Hetta er ein meginregla í avtalurættinum, og tí standast eingir trupulleikar av hesum.

Sum lýst á síðu 9 í skjali 3 (Roknskapur fyri tíðarskeiðið 1. januar til 30. juni 1997), er talan um ogn uppá kr. 234 mió., sum í høvuðsheitum greinast soleiðis:

Støðisogn:
Støðisognin er kr. 180 mió., harav bygningar og grundøki standa fyri kr. 63 mió. og kaðalar, støðir og radio standa fyri kr. 91 mió.

Ogn í umferð:
Ogn í umferð er kr. 54 mió. harav tøkur peningur er kr. 19 mió., áogn er slakar kr. 19 mió. og vørugoymsla kr. 16 mió.

Tá tað ræður um skuld og skuldbindingar, er beint øvugt. Her er meginreglan, at skuld ikki við frígerandi virkningi kann flytast frá TFL til partafelagið. Fyri at flyta skuld krevst loyvi frá honum, ið kravið hevur. Kravánararnir kunnu - uttan nakra grundgeving - mokta, at annar skuldari kemur í staðin. Verður skuldin flutt uttan loyvi frá kravánara, er meginreglan, at TFL og partafelagið hefta solidariskt fyri skuldini.

Ikki er óhugsandi, at onkur kravánari fyri at bøta um eina vánaliga avtalu, sýtir skuldarskiftinum fyri at samráða seg til betri sømdir. Hendir tað, verða slíkir kravánarar innfrøðir.

Skuldin, talan er um, er øll skuld hjá TFL, sum sær soleiðis út:

Við støði í ársroknskapinum pr. 31.12.1996 ***(Skjal 2)***, hálvársroknskapinum pr. 30.06.1997 ***(Skjal 3)*** og meting TFL's um hvussu støðan er pr. 31.12.1997 ***(Skjal 4)***, kann skuldin sundurgreinast soleiðis:

Slag av skuld	*Skuld pr.* 31.12.96	*Skuld pr.* 30.06.97	*Mett pr.* 31.12.97
Langfreistað	87,7	75,0	66,7
Stuttfreistað			
Avdráttir	41,3	38,6	26,9
Peningastovnar	2,4	0,5	0,0
Fyrútgjald	4,5	5,2	5,2
Vøra- /tænasta	11,7	16,4	16,4
Onnur skuld	19,3	14,4	14,4
	79,2	75,1	62,9
Skuld alt	166,9	150,1	129,6

Langfreistaða skuldin:
Langfreistaða skuldin er lán frá
- Nordisk Investeringsbank (NIB)
- Skandinaviska Enskildabanken (SEB)
- 60-millióna grunninum og
- Føroya Banka.

Landskassin borgar sum sjálvskuldari mótvegis NIB og SEB. Borgan landskassans mótvegis NIB er fyri trý lán hjá TFL, hvørs samlaða restskuld pr. 30.06.1997 var umleið kr. 61,4 mió. Av avdráttartíðini eru umt. 6 ár eftir.

Borgan landskassans mótvegis SEB er fyri eitt lán, hvørs restskuld pr. 30.06.1997 var kr. 17,2 mió.

Landsstýrið hevur tá áskoðan, at umleggingin til partafelag, í so stóran mun sum til ber, skal loysa landskassan frá ábyrgd síni móti felagnum. Tí er eitt av málunum at sleppa landskassanum undan verandi borgsskyldum í sambandi við umleggingina.

TFL hevur søkt NIB um loyvi til

at P/F Telefonverkið yvirtekur lánini hjá TFL og

at NIB góðtekur at loysa landskassan frá sjálvskuldaraborganini.

NIB hevur prinsippgóðkent umsóknina og góðtekur aðra trygd í staðin, t.e. 1. veðrættur í føstu ogunum.

Í prinsipptilsøgnini eru onkrar treytir, sum TFL ikki vil ganga undir, og tí mugu nærri samráðingar til, áðrenn tilsøgnin er endalig.

Verður tað, at partarnir ikki koma til sættis, og NIB tvíheldur um framhaldandi borgan frá landskassanum, verður neyðugt at venda sær til Føroya Løgting um, at heimila Føroya Landsstýri at borga mótvegis NIB fyri hesum lánum, sum verða yvirtikin av partafelagnum.

Lánið hjá SEB fellur til gjaldingar í síni heild komandi apríl mánað. TFL hevur tikið avgerð um at innfría lánið hjá SEB, tí neyðuga gjaldføri loyvir hesum. Landskassin sleppur soleiðis undan framhaldandi at veðhalda mótvegis SEB.

Lánini hjá 60-miltíma grunninum eru pr. 30.06.1997 til kr. 29,5 mió. Hesi skuld ábyrgist landskassin tó ikki fyri á annan hátt, enn hann ábyrgist fyri ein hvønn annan almennan stovn.

Lánið hjá Føroya Banka er nýtt 7 ára lán, sum TFL hevur stovnað í september 1997, stórt kr. 6,1 mió. Sum trygd fyri láninum er tinglýst skaðaloysisbræv, stórt kr. 7,32 mió.

Stuttfreistaða skuldin:
Avdráttir:
Av tí stuttfreistaðu skuldini er stórur partur "Avdráttur", sum samsvarar roknskapinum er "Avdráttir av langfreistaðari skuld, sum falla til gjaldingar komandi ár".

Peningastovnar:
Her er talan um føroyskar peningastovnar. Ætlanin er, at eingin skuld skal vera við árslok.

Forútgjald:
Hetta kemur fram sum forútgjald hjá viðskiftafólki fyri telefon v.m. TFL krevur forútgjald, og tí er hetta altíð ein postur, upptikin í stuttfreistaðu skuldina. Henda skuld elvir ikki til nakrar tvidølleikar við umleggingina.

Vøruframsta:
Her er talan um vøru- og tænastuskuld. Av hesi skuld er størsti parturin leypandi millumverandi hjá TFL við tveir høvuðssamstarvsfelagar, nevniliga Tele Danmark og L.M.Ericsson.

Skuldin til Tele Danmark stavar frá javning av gjaldi partanna millum í uttanlandssamskiftinum.

Skuldin til L.M.Ericsson, sum er høvuðsleverandørur av fjarskiftisútgerðini hjá TFL, stavar frá leypandi samarbeiði partanna millum.

TFL hevur frá báðum leverandørum fingið boð um, at hesir ikki meta tað vera nakran trupulleika hjá nýggja partafelagnum at yvirtaka ta skuld, sum verður pr. 31. 12. 1997.

Onnur skuld:
Av hesi skuld er stívliga helvtin leypandi skuld til Toll- og Skattstovuna fyri MVG, sum verður goldið kvartárliga aftanút. TFL arbeiðir við góðkenning teirra av yvirtøkuni og metir ikki, at hetta kemur at elva til nakrar trupulleikar. Restin av skuldini er vanlig leypandi vøruskuld, sum ikki verður mett at geva nakrar trupulleikar.

Til § 3, stk. 1.
Greinin ásetir endamálið hjá nýggja felagnum. Hetta merkir, at aðalfundurin ikki kann broyta endamálsorðingina í viðtøkunum soleiðis, at felagið fer í holt við aðra vinnu enn hana, 1. stk. ásetir. Um so er, at partafelagið ynskir at fara í aðra vinnu enn fjarskiftisvinnu, krevst lógarbroyting.

Til § 3, stk. 2.
Av samlaðu eginognum felagsins skal ein partur vera partapeningur og ein partur líkar ognir.

At partapeningurin verður skotin upp til 75% av eginognini, er tí, at mett verður, at eitt slíkt lutfall millum eginogn og partapening er hóskandi fyri eina slíka fyritøku.

Við støði í hálvársroknskapinum 1997, skjal 3, síða 10, var eginognin 30. juni 1997 kr. 84.1 mió.

Við støði í metta hálvársroknskapinum, skjal 4, har roknað verður við einum úrsliti uppá kr. 16.8 mió., svarar 75% rundað til næmasta kr. 5 mió., til kr. 75 mió.

At felagið verður stovnað við hesum partapeningi, er tó ikki til hindurs fyri, at partapeningurin sum frá líður verður tillagaður skiftandi tørvi og umstøðum.

Til § 3, stk. 3.
Her verður ásett, at allur partapeningurin í nýggja felagnum verður ogn landsins, og er hetta at skilja sum tann til hvørja tíð verandi partapeningur, eisini eftir nøguligar hækkingar.

Við hesi grein verður tryggjað, at privatisering av partafelagnum ikki kann fremjast uttan løgtingsins samtykki.

Til § 4, stk. 1.
Skrásetingargjald til Skráseting Føroya er fyri partafeløg í løtuni kr. 2.500 umframt 4‰ av teknaða partapeninginum.

Verður partapeningurin sum ætlað kr. 75 mió., er talan um skrásetingargjald uppá stívar kr. 300.000,-, sum mett verður, ikki eigur at verða goldið, tá talan er um umlegging av almennum stovni til partafelag.

Sambært galdandi partafelagslóg, anordning nr. 250 frá 3. mai 1993, er tað Føroya Landsstýri, sum eftir § 154, stk. 3 hevur heimild til at áseta nærri reglur um gjøld fyri skráseting.

Til § 4, stk. 2.
Hóast tað er ein almennur stovnur, ið avhendir fasta ogn, er hesin ikki undantikin tinglýsingargjaldi.

Tinglýsing er føroyskt sermál, og løgtingið hevur tí heimild til, í serlóg sum hesari, at undantaka stovnin frá tinglýsingargjaldinum, sum annars hevði verið 1% av tinglýsingarvirðinum. Verða føstu ognirnar ið tinglýsast skulu, mettar til umk. kr. 70 mió., verður talan um tinglýsingargjald uppá umk. kr. 700.000,-, sum metti verður, ikki eigur at verða goldið, tá talan er um umlegging av almennum stovni til partafelag

Til § 5.
Reglan ger endaliga upp virðini á ogn og skuld, tá um skatting ræður.

Til § 6.
Lógin fær gildi dagin eftir, hon er kunngjørd.

Í tíðarskeiðinum fram til 1. jan. 1998 er neyðugt, at galdandi lóggáva frumhaldandi verður verandi í gildi sum grundarlag undir virksemi telefonverksins.

Tá partafelagið er stovnað 1. januar 1998, fer tann í § 6 nevnda lóggáva úr gildi sama dag.

Skjøl
Skjal 1.
Frágreiðing um umskipan av Telefonverk Føroya Løgtings til partafelag.
Henda frágreiðing er givin av arbeiðsbólki, samansettur soleiðis:
1. Andras Róin, telefonverkstjóra, vegna leiðsluna á TFL.
2. Una Joensen, vegna leiðsluna á TFL.
3. Janus Djurhuus, felagsálitismaður, vegna starvfólki á TFL.
4. Jógvan Thomsen, varaálitismaður, vegna starvsfólk á TFL.
5. Jákup Danielsen, formaður í Starvsmannafelagnum.
6. Súni Schwartz Jacobsen, statsautoriseraður grannskoðari, KPMG.

Skjal 2.
Ársroknskapur 1996
Ársfrágreiðing 1996 hjá Telefonverk Føroya Løgtings við tilhoyrandi grannskoðaðum rakstrarroknskapi og fíggjarstøðu frá 7. apríl 1997.

Skjal 3.
Hálvársroknskapur 1997/1
Hálvársroknskapur fyri Telefonverk Føroya Løgtings fyri tíðarskeiðið 1. januar 1997 til 30. juni 1997. Roknskapurin er ikki grannskoðaður, men grannskoðarin hevur hjálpt til við uppseting av honum.

Skjal 4.
Mettur hálvársroknskapur 1997/2
Meting Telefonverk Føroya Løgtings av rakstraðrslitinum frá 1. juli 1997 til 31. december 1997 tann 17. oktober 1997.

Skjal 5.
Høvuðstøl úr fíggjarætlan Telefonverksins 1997 - 2002
Telefonverk Føroya Løgtings hevur sett upp "Høvuðstøl úr fíggjarætlan Telefonverksins 1997 til 2002" tann 17. oktober 1997.

Fylgiskjøl til lógaruppskot um umskipan av Telefonverk Føroya Løgtings til alment partafelag

Skjal 1

Telefonverk Føroya Løgtings

Frágreiðing um umskipan av TFL til partafelag

1. INNGANGUR

Telefonverk Føroya Løgtings (TFL) er ein stovnur undir Føroya Landsstýri. Landsstýrismaðurin í fjarskiftismálum hevur endaligu fyrisitingarligu ábyrgdina av TFL. Telefonverksstjórin hevur tá dagligu ábyrgdina.

TFL er stovnað sambært lóg og verður rikið sambært kunngerðum frá Føroya Landsstýri, sum hevur einkarætt til fjarskiftistænastur í Føroyum.

Fjarskifti og kunningartøkni eru øki, sum eru í skjótari menning, bæði í Føroyum og í øðrum londum. Aftan fyri menningina liggur ein hugburður um, at fjarskifti og kunningartøkni sum heild eru av stórum týdningi fyri samfelagsligu og búskaparligu menningina yvirhøvur.

Eisini í Føroyum er gongd komin á fjarskiftisøkinum. Ein nýggj føroysk fjarskiftislóg fær gildi 1. juli 1997. Nýggja fjarskiftislógin setur karmarnar fyri liberaliseringum og harvið eini vaksandi kapping mótvegis TFL.

Fjarskiftið kennir ikki til landamørk, hvørki fíggjarliga ella tøkniliga. Internationaliseringin merkir, at bæði marknaðurin í Føroyum og virksemið á TFL virka í einum altjóða høpi, og at samanetingar mugu gerast í einum altjóða høpi.

Rákið í londunum rundan um okkum vísir, at tað verða knýtt tættari handilslig bond millum lond við avtalum, t.d. EBS og WTO. Umframt at Føroyar skulu fylgja reglunum hjá WTO, hevur ørðaskifti verið um at gera eina EBS-líknandi avtalu við ES. Slíkar avtalur seta m.a. krøv um liberaliseringar á teleamskiftisøkinum.

Uttan mun til formligar liberaliseringar hevur tann tøknifrøðiliga menningin við sær, at kappingin mótvegis TFL veksur. Sum dømi kunnu nevnast call-back tænastur úr øðrum londum, fylgisveinaskipanir og bílig radioútgerð. Hesi viðurskifti máða støðið undan verandi einkarætti og undan ávísum forrætningsumráðum, eitt nú uttanlandssamskiftinum.

Omanfyri nevndu viðurskifti hava við sær, at tað er alneyðugt at fylgja við menningini á fjarskiftisøkinum. TFL má tí støðugt tillaga seg broytingum í marknaðarviðurskiftunum.

Broyttu umstøðurnar hava í londunum kring okkum havt við sær víttfevnandi bygnaðarbroytingar í fjarskiftisfyritøknum. Áðrenn liberaliseringar av álvara taka seg upp og kappingin mótvegis almenna einkarættarhavaranum harðnar, eru hesir almennu stovnar oftast umskipaðir til partafeløg. Hetta er m.a. hent í Íslandi og Grønlandi.

Eisini í Føroyum má støða takast til, hvussu bygnaðurin á fjarskiftisøkinum skal skipast. Í hesum sambandi varð fundur hildin millum leiðslu og álitisfólk á TFL, umboð fyri fakfeløgini og ein fulltrúa úr Føroya Landsstýri.

Á fundinum varð avgjørt, at ein arbeiðsbólkur skuldi gera eina frágreiðing til Føroya Landsstýri um, hvussu TFL eigur at verða skipað í framtíðini.

Í arbeiðsbólkinum vóru:
Andras Róin, telefonverksstjóri, vegnaleiðsluna á TFL
Una Joensen, vegna leiðsluna á TFL
Janus Djurhuus, felagsálitsmaður, vegna starvsfólk á TFL
Jógvan Thomsen, varaálitsmaður, vegna starvsfólk á TFL
Jákup Danielsen, formaður í Starvsmannafelagnum
Súni Schwartz Jacobsen, statsaut. revisor, KPMG.

Arbeiðsbólkurin hevur viðgjørt ymiskar bygnaðarmøguleikar, t.d. núverandi bygnað, "nýmótans" almennan stovn, almennan stovn við egnari nevnd, vinnurekandi grunn og partafelag. Í viðgerðini hevur dentur verið lagdur á leiðsluviðurskifti og avgerðarførleika. Arbeiðsbólkurin er samdur um, at umskipan av TFL til eitt partafelag gevur bestu fortreytir á framtíðar fjarskiftismarknaðinum. Tí eru einans viðurskifti viðvíkjandi einum partafelag lýst í hesi frágreiðing, meðan tað í fyrsta lagi er greitt frá øðrum bygnaðarmøguleikum. Bólkurin hevur ikki tikið støðu til, hvussu ognarviðurskiftini til TFL skulu verða í framtíðini. Útgangsstøðið hevur sostatt verið, at TFL í fyrstu syftu verður umskipað til eitt 100% alment partafelag.

2. NIÐURSTØÐA

Nýggja fjarskiftislógin, ið fær gildi frá 1. juli 1997, gevur møguleikar fyri liberaliseringum og harvið økturi kapping mótvegis TFL.

Rákið á fjarskiftisøkinum er ógvusligt, og bæði TFL og føroyska samfelagið kunnu skjótt gerast eftirhálar, um ikki rætt verður borið at. Fyri at standa seg í framtíðar fjarskiftisumhvørvinum er tað tí alneyðugt, at TFL fær teir neyðugu karmarnar at virka undir, soleiðis at m.a. avgerðir kunnu takast við tí skjótleika og frælsi, sum er neyðugt.

Arbeiðsbólkurin hevur viðgjørt fortreytirnar fyri einum kappingarførum TFL. Herundir eru viðgjørdir ymiskir bygnaðarmøguleikar fyri at lýsa leiðsluviðurskifti og avgerðarfrælsi.

Til tess at kunna veita viðskiftafólkunum tær tænastur, sum hoyra til í einum nýmótans samfelagi, at kunna tryggja eitt nøktandi fjarskiftiskervi um allar Føroyar og at kunna leggja lunnar undir eitt neyvari samstarv við aðrar fyritøkur á fjarskiftisøkinum, er alneyðugt at fylgja rákinum í øðrum londum og at virka fyri, at eisini TFL verður umskipað til partafelag skjótast gjørligt.

Arbeiðsbólkurin er samdur um, at starvsfólkaviðurskiftini undir ongum umstøðum eiga at versna, eftir at TFL er umskipað til eitt partafelag.

Sum lýst í hesi frágreiðing, er ein umskipan til partafelag ikki ein trupul uppgáva, hóast arbeiðs- og tíðarkrevjandi. Arbeiðsbólkurin metir tað vera ein fortreyt fyri haldgóðari menning av fjarskiftisøkinum í Føroyum, at vit eru eitt virkandi partafelag pr. 1. januar 1998, og fyri at hetta skal eydnast krevst, at politiskt loyvi verður givið til eina umskipan tíðliga á heysti 1997.

Arbeiðsbólkurin heitir tí við hesum á Føroya Landsstýri um at skipa so fyri, at TFL skjótast til ber verður umskipað til eitt alment partafelag.

Arbeiðsbólkurin vónar, at Føroya Landsstýri og Føroya Løgting skilja týdningin av, at skjótt verður borið at. Arbeiðsbólkurin vónar, at okkara ynski verða gingin á møti av Føroya Landsstýri, og at tey kunnu viðgerast av Føroya Løgtingi skjótast gjørligt eftir ólavsøku 1997.

Tórshavn, tann 26. juni 1997

Andras Róin	Una Joensen	Janus Djurhuus
Jógvan Thomsen	Jákup Danielsen	Súni Schwartz Jacobsen

3. ENDAMÁL VIÐ UMSKIPAN AV TFL TIL PARTAFELAG

Høvuðsendamálini við at umskipa TFL til eitt partafelag eru:

1. At gera skilnað millum
   - politisku ábyrgdina og dagligu leiðsluábyrgdina
   - fyrisitingarligu- og dagligu raksturábyrgdina
   - eftirlitið við og raksturin av fjarskiftinum

   Sambært nýggju fjarskiftislógini kann landsstýrismaðurin veita konsessión fyri eitt umráði til eina ella fleiri fyrtøkur. Skilnaður eigur at verða gjørdur millum tann myndugleika, ið veitir konsessiónir, og eigaraviðurskiftini til tær konsessioneraðu fyritøkurnar. Við at umskipa TFL til eitt partafelag fæst tann neyðugi skilnaðurin.

   Harafturat eru ábyrgdarviðurskiftini í einum partafelag greið, við tað at nevnd og stjórn hava endaligu raksturligu ábyrgdina.

   Politisk ávirkan, fyrisitingarlig ávirkan og eftirlit verða tryggjað gjøgnum ognarviðurskiftini, konsessiónstreytirnar og fjarskiftiseftirlitið.

2. Økt kapping krevur økt avgerðarfrælsi og møguleika at taka avgerðir eftir handilsligum fortreytum. Avmarkað avgerðarfrælsi í mun til kappingarneytarnar ger tað torført at standa seg í ti alsamt vaksandi alfjóða kappingini.

   Ein almennur stovnur hevur, sum er, ikki sama møguleikar at tillaga seg á einum marknaði í kapping til tess eru karmarnir ov stirvnir.

   Tað er ein sannroynd, at týdningarmiklar avgerðir fyri ein almennan stovn kunnu fáa drúgva viðgerð í landsfyrisitingini, og møguliga eisini í løgtingimum, áðrenn avgerð verður tikin.

   Í einum partafelag er grundarlag fyri eini skjótari viðgerð, tí tað er leiðslan, tó tekur slíkar avgerðir.

3. Tær telefyritøkur, tó TFL samstarvar við, eru í flestu førum fyrrverandi almennir stovnar, ið eru umskipaðir til partafeløg, m.a. fyri at standa seg í kappingini. Telefyritøkur skipaðar sum partafeløg eru sostatt vælkendar í øðrum londum.

   Tað er av stórum týdningi fyri samstarvspartarnar, at leiðslan á TFL hevur avgerðartørleika til at gera neyðugar avtalur.

4. INNTØKUGRUNDARLAG, ÚTLIT OG ÆTLANIR

4.1 Inntøkugrundarlag

Tá spurningurin um umskipan av einum almennum stovni til eitt sjálvstøðugt partafelag skal viðgerast, er natúrligt fyrst at gera nakrar metingar um virkseni stovnsins og núverandi inntøkugrundarlagið, fyri at lýsa grundarlagið fyri eini sjálvstøðugari tilveru hjá fyritøkuni.

Núverandi inntøkugrundarlag kann lýsast við støði í nettosølu, og kann sundurgreinast soleiðis:

tkr.	R1995	R1996	Æ1997	Æ1998
Fastnettelefoni	55.000	80.000	86.000	88.000
Fartelefoni	12.000	15.000	18.000	21.000
Felagagjøld	23.000	23.000	25.000	25.400
Annað	41.000	29.000	36.000	40.000
Nettosøla í alt	131.000	147.000	165.000	174.400

Minkingin í øðrum inntøkum og vøksturin í inntøkunum frá fastnettelefonitni frá 1995 til 1996 stava fyri ein stóran part frá avtalum við Tele Danmark um yvirtøku av ymiskum umráðum. Frá 1996 fer vøksturin einahelst at stava frá fartelefoni og øðrum inntøkum m.a. telebúðum og nýggjum tænastum.

Mett verður, at TFL hevur eitt gott inntøkugrundarlag við góðum møguleikum fyri framhaldandi vøkstri og rentuhlum rakstri, og harvið einum góðum útgangsstøði til at klára seg í einum kappingarumhvørvi.

4.2 Ætlanir

Tær ætlanir, sum verða lagdar í eini telefyritøku, mugu avspegla tað umhvørvi og tær spælireglur, sum verða mettar at verða galdandi tey komandi árini. Ætlanirnar skulu umfata prísir, marknaðarútlit, fíggjarviðurskifti (performance), tænastustøði og útboð, bygnaðin innanhýsis og úteftir, samstarvsmøguleikar o.s.fr. Felagsheitið er kappingarføri.

Rakstrarviðurskifti: TFL er væl fyri rakstrarliga í mun til t.d. aðrar føroyskar stovnar. Neyðugt er tó at meta okkum við aðrar núverandi og komandi telefyritøkur. Til samanetingar eru niðanfyri víst lyklatøl fyri aðrar telefyritøkur í Norðurlondum:

Lyklatøl fyri 1996	TFL	Tele DK	TELE GR	PÓSTUR OG SÍMI
Rakstraravkast (%)	19,9	19,5	10,4	16,3
Ognaravkast (%)	12,3	9,7	5,3	10,5
Gjaldførisevni (%)	83,0	190,2	148,0	199,0
Trygdarevni (%)	30,0	59,2	44,5	52,6
Nettosøla pr. starvsfólk (t.kr.)	809	1.430	1.122	*)

*) tølini eru ikki tøk

"Performance" parametrar á fíggjarliga økinum, sum t.d. rakstraravkast, gjaldførisevni, trygdarevni, søla og úrslit pr. starvsfólk v.m., eru parametrar, sum verða høgt prioriteraðir í framtíðar ætlanunum.

Prísir: Umframt ein minni marknað enn í londunum uttan um okkum hava vit í Føroyum hægri rakstrar- og fløgukostnaðir. Hetta merkir, at prislegan er hægri enn í øðrum londum.

Men við yvirtøkum, framskundaðum digitaliseringum og bygnaðarbroytingum eru fortreytirnar fyri prislækkingum á fleiri økjum um at vera til staðar.

Marknaðarútlit og tænastuútboð: Fjarskiftismøguleikarnir eru serliga áhugaverdir í einum útjaðaraøki sum tí føroyska, og er hetta við til at økja áhugan hjá øðrum telefyritøkum at virka her. Væntast kann sostatt, at tænastuútboðið veksur, hóast tað helst verður minni enn í londunum uttan um okkum.

Ein fortreyt fyri einum framhaldandi góðum og nøktandi inntøkugrundarlagi er, at tænasturnar, sum TFL bjóðar út, eru tillagaðar til marknaðin bæði í nøgd, góðsku og í prísi.

Fyri at fylgja við í menningini á fjarskiftisøkinum má TFL alsamt gera íløgur í nýggja tøknifrøði til tess at kunna bjóða út nýggjar og meira framkomnar tænastur. TFL skal til eina og hvørja tíð kunna nøkta torvtu og krøvini hjá viðskiftafólkunum og gera hetta á einum handilsligan forsvarligum grundarlagi. Tí má TFL, við ella uttan liberaliseringar, skjótast til ber tillaga virksemið fyri at klára seg í einum kappingarumhvørvi. Tá ið talan er um møguligar nýggjar tænastur, fer TFL í hvørjum einstøkum fori at gera metingar av, um talan er um tænastur, ið geva avkast og undir hvørjum treytum. Hetta fer at krevja skjótar og smidligar mannagongdir, neyvar fíggjarligar lýsingar og eina strategiska tilrættislegging á einum støði, sum ikki hoiskar saman við núverandi tilknýti til politisku skipanina.

Bygnaðurin: bygnaðurin innanhýsis má laga seg til broyttu marknaðarkrovtni og broytingarnar í umhvørvinum sum heild. Útoftir merkir hetta, at TFL má virka sum ein handilsfyritøka uttan av nøgvar politiskar bindingar á rakstrar- og íløgusíðuni.

Samstarvsmøguleikar: orsakað av internationaliseringini verður tað alsamt meira umráðandi, at TFL megnar at samstarva við aðrar fyritøkur í Føroyum og uttanlands.

4.3 Fortreytir fyri ætlanunum

Eitt er at leggja langtíðarætlanir og seta málsetningar fyri TFL. Til tess at seta ætlanirnar í verk, leggja til rættis og røkka teimum settu málunum krevst, at fleiri fortreytir eru til staðar. Í hesum viðfangi skulu urðgjar høvuðsfortreytir nevnast, nevniliga íløgur, avgerðarfrælsi og human ressources/starvsfólk:

Íløgur

Íløgur á fjarskiftisøkinum eru at sammeta við íløgur í telduútgerð. Fyri hvørt ár læst betri, hentari og effektivari útgerð fyri minni pening, men samstundis er fyri TFL eisini talan um sera íløgukrevjandi virksemi og støðugt vaksandi krøv frá viðskiftafólki um betri og bíligari tænastur.

TFL hevur inntil 1996 arbeitt út frá einari langtíðaríløguætlan, har mett varð, at TFL hevði ráð til og annars helt tað vera skilagott at gera íløgur fyri 20 mill. kr. um árið. Sambært hesi langtíðaríløguætlan vildi verið møguligt at digitaliserað meginpartin av Fysturoynni í ár 1999 og Norðuroyggjar í ár 2001.

Langtíðaríløguætlanin tók ikki í nóg stóran mun hædd fyri eitt nú broytingum í marknaðarstøðuni á fjarskiftisøkinum í Føroyum. Heldur ikki var hædd tikin fyri, at einasti mátin at kunna lúka krøvini um betri og bíligart tænastur og at varðveita ein skilagóðan fíggjarpolitikk er at økja íløgurnar í betri og effektivari útgerð.

Eitt lágt íløguprosent í mun til søluna tey seinastu árini hevur gjørt, at TFL ikki hevur havt sama ágóða av nýggjari og betri tøknifrøði, sum tey hava havt í t.d. Íslandi. Tey seinastu árini hava íløgurnar hjá TFL svarað til umleið 10-14% av søluni. Í Íslandi og Grønlandi og fleiri av teimum størru londunum í Europa hava íløgurnar verið omanfyri 20% av søluni.

Digitalisering er ein fortreyt fyri fleiri og betri tænastum til viðskiftafólkið, eins og hon skapar møguleikar fyri minkandi rakstrarútreiðslum hjá TFL og harvið møguleikar fyri takstlækkingum í framtíðini. Tí hevur TFL søkt um loyvi til at hækka íløgurnar munandi tey næstu árini til tess at m.a. framskunda digitaliseringina, soleiðis at meginparturin av Fysturoynni verður digitaliseraður á heysti 1997 og Norðuroyggjar í 1998.

Avgerðarfrælsi

TFL hevur í dag ikki fult avgerðarfrælsi, hvørki viðvíkjandi íløgum, fíggjarviðurskiftum sum heild ella í øðrum samanhangum. Hetta kann náast við at gera TFL um til eitt partafelag.

Human ressources/starvsfólk.

Ein onnur avgerandi fortreyt, sum má vera til staðar, er, at TFL til eina og hvørja tíð hevur neyðugu serkunnleikan. Fjarskiftið, teldutøknin og rákið mótvegis sokallaða kunningarsamfelagnum seta alsamt størri krøv til førleikan hjá m.ø. starvsfólkunum á TFL.

Hetta kann fyri ein part uppfyllast við at økja skeiðvirksemið og eftir- og endurútbúgvingina. Viðvíkjandi starvsfólki við røttu førleikum eru marknaðarkreftirnar, útboð og eftirspurningur, tó galdandi.

Tað verður alsamt truplari hjá TFL at varðveita ekspertisuna og at fáa nýggj fólk at taka við starvi á TFL - til tess er lønarlagið alt ov lágt fyri einahelst leiðarastørvini og starvsfólk við serkunnleika.

Sum partafelag fær TFL nýggjar og betri møguleikar, men ikki minst í fyriteikingini til umskipan til partafelag hevur TFL brúk fyri góðum og slimbrandi setanar- og lønarviðurskiftum.

5. FÍGGJARVIÐURSKIFTI

Ein smidligari avgerðartilreiki í fíggjarmálum er av stórum týdningi í einum framtíðar kappingarumhvørvi. Í núverandi støðu er neyðugt at søkja landsstýrið um góðkenning til nýggjar lántøkur ella broytingar í verandi lánum. Í einum partafelag er tað leiðslan, ið tekur slíkar avgerðir.

Væntaða skuldin tann 1. januar 1998 verður 87,7 mió kr og kann sundurgreinast soleiðis:

	Mió.kr.
Nordiska Investeringsbanken	52,4
Skandinaviska Enskilda Banken	7,2
Íløgugrunnurin	28,1
	87,7

Lánini í Nordiska Investeringsbanken og Skandinaviska Enskilda Banken eru veitt við landskassaveðhaldi.

Í sambandi við umskipan til partafelag eru tveir møguleikar viðvíkjandi lániskuldini. Her kunnu nevnast møguleikar fyri, at:

1) partafelagið yvirtekur skuldina við verandi landskassaveðhaldum
2) partafelagið yvirtekur skuldina, og landskassaveðhaldið fellur burtur móti at lánveitararnir í staðin fáa veðhald í ognum TFL.
3) skuldin verður lagd um og møguliga fíggjað av føroyskum peningastovnum við veðhaldi í ognum TFL. Leiðslan á TFL hevur tá fatan, at føroyskir peningastovnar o.l. eru sinnaðir at veita partafelagnum neyðug lán.

Tann fyrsta loysnin er helst tann bíligasta, tí viðurskiftini viðvíkjandi lánunum í støran mun eru óbroytt.

Fyri at lætta um umskipanina og við tað at lánini verða skjótt afturgoldin, verður møguleiki 1 metturt at vera tann besti í verandi støðu.

Eftir at TFL er umskipað til partafelag, verða møgulig nýggj lán tikin uttan landskassaveðhald.

6. STARVSFÓLKAVIÐURSKIFTI

Á TFL eru eingi tænastumannaseti starvsfólk.

6.1 Sáttmálar

Øll starvsfólk eru sett sambæri sáttmála millum avvarðandi yrkisfelag og Føroya Landsstýri. Sambæri sáttmálunum eru starvsfólkini limir í fakfelagunum, sum umboða teirra starvsheiti og starvsøki. Verandi sáttmálar eru galdandi til 1999.

Yrkisfeløgini eru: Starvsmannafelagið, Magistarafelag Føroya, Føroya Verkfrøðingafelag, Búskapar- og Løgfrøðingafelagið, Havnar Arbeiðsmannafelag, Føroya Arbeiðarafelag og Handverkarafelagið.

Í sambandi við umskipan av TFL til partafelag verða øll starvsfólk flutt yvir í partafelagið, sum yvirtekur landsstýrisins rættindir og skyldur í hesum sambandi. Í seinasta lagi 6 mánaðir áðrenn verandi sáttmálar ganga út, fara samráðingar í gongd millum verandi feløg og leiðsluna um nýggjar sáttmálar. Hesi viðurskifti eiga at verða ásett í lógini um umskipan av TFL til partafelag.

Allir partar skulu viðurkenna, at tað eru starvsfólkini á TFL, sum avgera, hvør tey ynskja skal samráðast teirra vegna, og so leingi annað ikki er avtalað, verða tað verandi feløg, sum hava samráðingarrættin.

6.2 Lønarskipan

Verandi lønarskipan er bygd upp eftir einum grundlønarprinsippi, og fær størsti partturin av starvsfólkunum mánaðarløn. Limir í arbeiðarafeløgunum fáa tó tímaløn.

Størvini eru flokkað í lønarflokkar, alt eftir starvsheitt og innihaldi í starvinum. Verandi skipan ella praksis kann virka ov stirvin, tá ynski eru um at løna fólki øðrvísi - t.d. í sambandi við størri ella fleiri arbeiðsuppgávur, størri ábyrgd og útbúgving.

Tað er tí eitt breitt ynski um at fáa til vega lønarskipan, sum er greiðari og smidligari og sum motiverar starvsfólkini í størri mun enn nú. Arbeiðið at gera nýggja lønarskipan er eitt tíðarkrevjandi og týdningarmikið arbeiði, og hava fakfeløg sett sær sum mál at virka miðvíst fmóti at finna nýggjar leiðir. Leiðslan á TFL hevur givið til kennar, at verandi lønarskipanir eru ov stirvnar, og torført kann verða at fáa serkona arbeiðsmegi at taka við starvi á TFL.

Starvsfólkini hava ymiskar pensjónsskipanir, alt eftir hvørjum fakfelag tey eru í. Ynskiligt er at gera avtalu um eins pensjónsskipanir eftir prinsippinum 1/3 lønarpartur og 2/3 arbeiðsgevarapartur.

Hesi komandi árini verður ivaleyst arbeitt fram fmóti at finna ta best hóskandi lønarskipanina, sum gevur starvsfólkunum løn fyri tað arbeiði, tey gera, sum motiverar starvsfólkini at útbúgva seg og eina lønarskipan, sum gevur leiðsluni betri møguleikar at løna fólki við servitan og uppgávum annars.

Slík skipan krevur tó, at reglurnar um lønaráseting eru greiðar, lættar at skilja og, ikki minst, lættar at umsita. Roknast má við, at álitisfólkini ella umboð fyri starvsfólkini í størri mun enn nú koma at hava ein leiklut í lønarásetingini.

6.3 Onnur starvsfólkaviðurskifti

Felags fyri leiðslu og starvsfólk er at hava eitt gott arbeiðsumhvørvi, har leiðsla og starvsfólk hava sum endamál at veita viðskiftafólkunum eina góða og effektiva tænastu.

Innlit, ávirkan og opinleiki um virksemi og ætlanir eru týðandi fortreytir fyri, at starvsfólkini trívast og mennast.

Eitt gott amboð í samskiftinum millum leiðslu og starvsfólk er samstarvsnevnd/-ir. Í samstarvsnevndum verða t.d. arbeiðsviðurskifti, starvsfólkaviðurskifti, tillagingar í virksemimum, nýggj tøkni, fíggjarviðurskifti, praktiskar fyriskipanir, reglugerðir og starvsfólkapolitikkur v.m. viðgjørd.

Neyðugt er eisini við einum miðvísum útbúgvingar-, eftirútbúgvingar- og skeiðpolitikki, sum allir starvsbólkar eru partur av. Endamálið við slíkum politikki er, at starvsfólkini fáa ta eftirútbúgving, sum er neyðug til at kunna røkja teirra arbeiði og at menna teirra førleika.

Starvsfólkaviðurskifti verða skipað sambært starvsfólkapolitikki. Starvsfólkapolitikkur er ein lýsing av teimum reglum og viðurskiftum, sum eru galdandi á arbeiðsplássinum. Starvsfólkapolitikkurin verður myndaður við atliti at virksemi TFL. Ein arbeiðsbólkur er settur á TFL at orða ein starvsfólkapolitikk.

Samanumtikið er høvuðsendamálið við starvsfólkapolitikkinum, at arbeiðsplássið skal vera áhugavert og spennandi, har starvsfólk vilja virka, støðast og mennast. Samstarvsnevndin hevur ábyrgd av starvsfólkapolitikkinum.

7. PARTAFELAGSVIDURSKIFTI

Tað er av týdningi, at tey politiskt avgjørdu viðurskiftini - tað veri seg fógargrundarlag, konsessiónsavtalur o.a., eru fastløgd, áðrenn almenna partafelagið verður stovnað.

7.1 Stovnan

Stovnan av partafelagnum kann fremjast við kontantum inngjaldi fyri partabrøvini ella við innskoti av netto-ogn (apportinnskoti).

Við tað at núverandi virksemi hjá TFL verður umskipað frá almennum stovni til partafelag, kunnu partabrøvini verða goldin við apportinnskoti. Tað er tí ikki neyðugt at inngjalda partapeningin kontant. Verða partabrøv fult ella partvíst goldin við partabrøvum, skulu ein metanarfrágreiðing og ein byrjanarfíggjarstøða fyri partafelagið gerast.

Felagið kann sambært praksis stovnast við aftanvirkandi gildi í upp til 6 mánaðir, tá talan er um umskipan av einum verandi virki. Verður felagið stovnað pr. 1. januar 1998, skulu øll tey formligu viðurskiftini í sambandi við stovnanina verða avgreidd í seinasta lagi 30. juni 1998.

Nevndin skal skráseta felagið hjá Skráseting Føroya í seinasta lagi 6 mánaðir eftir, at stovningarskjalið er undirskrivað.

7.2 Viðtøkur

Partafelagslógin er galdandi fyri øll partafeløg. Partafelagslógin er á fleiri økjum ein rammulóg. Í tí einstaka felagnum eru viðtøkurnar "lógin" fyri felagið og útfylla rammulógina. Viðtøkurnar skulu taka støðu til ítøkiligar spurningar um t.d. navn, heimstað, endamál felagsins, viðurskifti um partapening, nevnd, stjórn, aðalfund og grannskoðara. Partapeningurin í einum partafelag skal vera minst 500.000 kr.

Mett verður, at viðtøkurnar í fyrstu atløgu bert skulu taka støðu til tey viðurskifti, ið eru neyðug fyri at reka eitt 100% alment partafelag.

Seinni kann so støða takast til viðtøkubroytingar, eitt nú um og á hvønn hátt partapeningur verður útboðin til privatar investorar.

Av tí at TFL væntandi fer at virka í einum hørðum kappingarumhvørvi, og neyðugt er við stórum fløgum, eiga viðtøkurnar at taka støðu til eitt hægstumark fyri vinningsbýti. Hetta skal tryggja, at TFL verður konsoliderað best møguliga.

7.3 Leiðsluviðurskifti

Í einum partafelag er aðalfundurin hægsti myndugleiki. Aðalfundurin verður umboðaður av partaeigarunum.

Aðalfundurin velur eina nevnd, sum skal hava ábyrgdina av leiðsluni í felagnum. Nevndin setur eina stjórn at taka sær av dagligu leiðsluni.

Í einum 100% almennum partafelag er tað avvarðandi landsstýrismaður, sum er hægsti myndugleiki í felagnum.

Í viðtøkum felagsins verða innanhýsis partafelagsviðurskifti skipað.

7.4 Val av nevnd

Partafelagslógin ásetir, at nevndarlimir verða valdir á aðalfundinum.

Hvast skal í huga, at partafelagslógin gevur starvsfólkunum í felagnum rætt til at velja limir í nevndina. Fyri TFL hevur starvsfólkið rætt til at velja minst 2 nevndarlimir. Talið av nevndarlimunum valdir av starvsfólkunum kann ikki vera meira enn 50% av allari nevndini. Hinar limirnar velur aðalfundurin/avvarðandi landsstýrismaður, um ikki annað er fest í viðtøkurnar.

Nevndin eigur at verða sett saman á tann hátt, at felagnum verði tryggjað best møguligur handilsligur serkunnleiki og mótspæl til dagligu leiðsluna. Harafturat skal avvarðandi landsstýrismaður hava møguleika fyrt at fylgja gongdini í felagnum.

Felagið eigur sostatt at hava minst 5 nevndarlimir. 2 limir verða valdir av starvsfólkunum, ein limur umboðar avvarðandi landsstýrismann, og 2 limir verða valdir úr vinnulívinum.

Í sambandi við stovnanina av partafelagnum eigur støða at takast til, í hvønn mun tann nevndarlimur, ið umboðar landsstýrismannin hevur rætt til at lata landsstýrismannimum upplýsingar um felagið. Á sama hátt eigur støða at takast til, í hvøn mun landsstýrismaðurin hevur rætt til at vegleiða nevndarlimin.

8. REGULERING/EFTIRLIT

At fara frá einum almennum stovni til eitt alment partafelag hevur m.a. við sær eitt skifti frá dagligari politiskari stýring til rammustýring.

Ábyrgdin hjá politikarunum verður at seta rammurnar fyri, hvussu TFL í høvuðsheitum skal rekast, meðan tann dagliga leiðslan verður latin nevnd og stjórn.

Tann nýggja fjarskiftislógin er ein sokallað rammulóg, har staðfest verður, at heimastýrið hevur einkarætt til alt økið og kann lata øðrum rættin at reka fjarskiftið.

Skipanin verður soleiðis, at landsstýrismaðurin kann lata einum ella fleiri fyritøkum konsessión til at reka fjarskifti. Eisini kann landsstýrismaðurin taka avgerð um at gera partar av fjarskiftisøkinum heili ella hvørst frælsar. Tað merkir, at einki serstakt loyvi skal til frá tí almenna at reka fjarskifti á teimum frælsu økjunum. Fyri TFL merkir hetta, at tað skal hava konsessión til tey øki, sum ikki verða fræls.

Í eini konsessión verða treytir settar um til dømis veitingarskyldu, tíðarskeið fyri konsessión, gjald fyri konsessión og viðskiftatreytir.

Eitt fjarskiftiseftirlit verður sett á stovn, sum skal hava eftirlit við, at krøvini, sum sett eru í fjarskiftis-lógini ella við heimild í henni, verða hildin.

9. ONNUR VIÐURSKIFTI

9. 1 Bókhalds- og roknskaparviðurskifti

TFL hevur egið edv-kervi, bókhald og egnar skrásetingarskipanir.

Ársroknskapirnir hjá TFL eru tey seinastu árini gjørdir sambært ásetingunum í ársroknskaparlógini, eins og galdandi er fyri partafeløg.

Í sambandi við umskipan til partafelag er sostatt ikki neyðugt at broyta bókhalds- og skrásetingarskipanir.

9.2 Skatta- og mvg viðurskifti

Í núverandi støðu er TFL ikki skattskyldugt.

Í sambandi við umskipan til partafelag verður skattalógin galdandi fyri TFL., og verður tí skattað av yvirskotinum. Verður vinningsbýti útgoldið, skal TFL. afturhalda 35% í avgjaldi, sum skal avroknast til Toll- og Skattstovu Føroya.

Í núverandi støðu er TFL umfatað av vanligum reglum um mvg-avgjald. Henda støðu verður óbroytt í sambandi við umskipan til partafelag.

Omanfyri nevnda er treytað av, at serlig undantøk verða ikki gjørd í høgini.

9.3 Ávirkan á landskassan
Tá TFL er umskipað til partafelag, fær landskassin inntøkur frá koncessiónsgjaldi, partafelagsskatti og møguligum vinningsbýti.

ÍSKOYTI 1: BYGNAÐARMØGULEIKAR
Høvuðsendamálini við at umskipa TFL til eitt alment partafelag eru at gera skilnað millum politisku ábyrgdina og dagligu leiðsluábyrgdina og at økja smidleikan og avgerðarfrælsið fyri at betra møguleikarnar at tillaga seg komandi liberaliseringum á fjarskiftisøkinum.

Ein høskandi spurningur er, um hesi endamál ikki kunnu røkkast við verandi bygnaði, soleiðis at tað ikki er neyðugt at taka stig til at umskipa TFL til eitt alment partafelag.

Umframt at greiða stutt frá eyðkennum fyri almennar stovnar hava vit í stuttum greitt frá øðrum útvaldum bygnaðarmøguleikum.

A. Almennur stovnur
Uppgávugrundarlagið í einum almennum stovni er givið í viðmerkingunum til ta árligu fíggjarlógina.

Ein almennur stovnur, sum fær játtan á fíggjarlógini, skal hava hoyvi úr høgtingimum m.a. til at taka lán. Harafturat verður fíggjarliga gongdin í eini landsfyritøku vanliga mett út frá ehnum kostnaðarsjónarmiði.

Á einum almennum stovni eru tað landsins avtalur og sáttmálar, sum eru galdandi viðvíkjandi lønar- og setanarviðurskiftum.

Á einum almennum stovni er tað avvarðandi landsstýrismaður, sum hevur endaligu ábyrgdina.

B. "Nýmótans" almennur stovnur
Ein tillaging av bygnaðinum er at geva landsfyritøkuni størri avgerðarfrælsi. Hetta kann til dømis vera økir møguleikar at taka lán, betri møguleikar at stovna dóttarfelog og keypa partabrøv í privatum felagum og møguleika fyri størri smidleika viðvíkjandi lønarviðurskiftum.

Ein slík skipan gevur størri frælsi á sumum økjum men skapar ikki tann skilnað millum politiska og dagliga leiðsluábyrgd, sum má metast at vera sera týdningarmikil.

C. Almennur stovnur við egnari nevnd
Í Danmark finnast dømi um landsfyritøkur við egnari nevnd, men hesar nevndir hava oftast einans ein ráðgevandi leiklut - hetta eru vanliga granskingar- og mentanarfyritøkur.

Mælt verður vanliga frá eini slíkari skipan í eini fyritøku, sum verður rikin eftir handilsligum fortreytum, tí ábyrgdarviðurskiftini eru ov ógreið. Tað er av týdningi, at nevndin fær veruliga ábyrgd, tí annars er vandi fyri, at nevndin verður ein áhugafelagsskapur hjá viðkomandi fyritøku.

D. Sjálvsognarstovnur
Tað, sum eyðkennir sjálvsognarstovnar, er, at eingin eigur teir. Hesir stovnar hava vanliga størri frælsi enn vanligir almennir stovnar viðvíkjandi leiðslu- og fíggjarættanarviðurskiftum.

Hesin bygnaður er høskandi, tá talan er um útbúgvingar- og mentanarstovnar. Sum dømi úr Danmark kunnu nevnast vinnuskúlar og Danmarks Radio. Henda skipan er tó ikki høskandi, tá talan er um handilsligt viðurskifti.

E. Vinnurekandi grunnur
Tað, sum eyðkennir vinnurekandi grunnar, eins og sjálvsognarstovnar, er, at ognarleikluturin er skerdur. Tað vil siga, at rakstrarliga eftirlitið við nevndini er avmarkað.

F. Almennur stovnur uttan fyri fíggjarætlanina
Almennir stovnar uttanfyri fíggjarætlanina verða nýttir í Noregi og hava verið nýttir í Finnlandi og Svøriki.

Endamálið við eini slíkari skipan er at geva dagligu leiðsluni sama frælsi sum í einum privatum felag.

Í Noregi er ein slík landsfyritøka eitt sjálvstøðugt rættarsubjekt, sum hevur frían avgerðarrætt viðvíkjandi inntøkum og útreiðslum umframt lántøku. Tó kann hægstamark setast á lántøkurnar. Staturin veðheldur fyri skuldini. Um fyritøkan fær rakstrarligar fíggjarligar trupuleikar, bindur staturin seg til at veita neyðuga hjálp.

Ábyrgdarviðurskiftini í eini slíkari fyritøku eru ógreið. Harumframt kunnu trygdarveitingar frá statinum hava við sær, at leiðsla og nevnd ikki reka fyritøkuna á rakstrarliga bestan hátt. Harafturat er bygnaðurin kappingaravlagandi, tí kappingarneytarnir hava ikki somu treytir.

G. Samandráttur
Tann skilnaður millum politiska ábyrgd og dagliga leiðsluábyrgd, sum vit meta er sera týdningarmikil, fest ikki í nøkrum av omanfyri nevndu møguleikum. Nakrir av nevndu møguleikum kunnu tó geva møguleika fyri øktum avgerðarfrælsi.

Økt avgerðarfrælsi eigur at hanga saman við støri ábyrgd. Hetta fest við einum partafelag, tí her eru avgerðarførleiki og ábyrgdarviðurskifti greið.

Ískoyti 2: Roknskapartøl
Fyri at lýsa gongdina í rakstri, fíggjarstøðu, peningastreymi v.m. eru í talvuni niðanfyri settar upp upplýsingar frá roknskapunum fyri árini 1994 til 1996. Harafturat eru sett upp tøl sambært rakstrarætlanini fyri 1997 (1997Æ).

	1994	1995	1996	1997Æ
Rakstur				
Nettoinntøkur	128.000	131.000	147.000	165.000
Framleiðsluvirði	148.538	151.494	160.502	181.525
Rakstrarkostnaður	(82.875)	(84.545)	(93.397)	(107.215)
Avskrivningar upp á støðisogn	(34.590)	(32.118)	(37.796)	(43.420)
Fíggjarkostnaðir, netto	(15.603)	(13.424)	(11.371)	(8.944)
Úrslit	10.439	21.407	17.938	21.945
Fíggjarstøða				
Støðisogn	211.254	197.794	171.483	179.947
Ogn í umferð	50.540	51.588	66.095	36.541
Ogn í alt	261.794	249.382	237.578	216.488
Eginogn	31.415	52.822	70.760	95.505
Lániskuld	184.926	156.294	128.988	95.929
Onnur skuld	45.453	40.266	37.830	25.054
Eginogn og skuld í alt	261.794	249.382	237.578	216.488

Peningastreymur				
Frá rakstri	44.904	55.781	56.631	61.710
Frá íløgum	(16.193)	(18.658)	(11.485)	(32.860)
Frá fígging	(37.932)	(33.651)	(28.719)	(41.928)
Peningastreymur í alt	(9.221)	3.472	16.427	(13.079)
Lyklatøl				
Rakstraravkast (%)	24,3	26,5	19,9	21,1
Ognaravkast (%)	11,9	13,9	12,3	14,3
Gjaldførisevni (%)	70,0	78,0	83,0	65,0
Trygdarevni (%)	12,0	21,0	30,0	44,0
Tal av fastnettelefonfelagum	22.637	22.246	22.856	23.372
Tal av fartelefonfelagum	2.156	2.557	3.264	4.500
Starvsfólk	195	177	182	190

Skjal 2

Lyklatøl 1)

Rakstur (tkr.)	**1994**	**1995**	**1996**
Nettosøla	128.052	131.264	147.363
Bruttovinningur	107.314	109.218	115.044
Úrslit áðrenn rentur	31.073	34.831	29.309
Ársins úrslit	**10.439**	**21.407**	**17.938**

Fíggjarstøða (tkr.)	**1994**	**1995**	**1996**
Støðisogn	211.254	197.794	171.483
Ogn í umferð	50.540	51 588	66.095
Ogn alt	261.794	249.382	237.578
Eginpeningur alt	**31.415**	**52.822**	**70.760**

Peningastreymur (tkr.)	**1994**	**1995**	**1996**
Raksfur	44.904	55.781	56.631
Íløgur	(16.193)	(18.658)	(11.485)
Fígging	(37.932)	(33.651)	(28.719)
Broyting í tøkum peningi	(9.221)	3.472	16.427

Lyklatøl %	**1994**	**1995**	**1996**
Rakstraravkast 2)	24,3	26,5	19,9
Ognaravkast 3)	11,9	13,9	12,3
Gjaldførisevni 4)	70	78	83
Trygdarevni 5)	12	21	30

Aðrar upplýsingar

Tal av fastnettelefonfel.	22.637	22.246	22.856
Tal av fartelefonfelagum	2.156	2.557	3.264
Starvsfólk (ársverk)	195	177	182

1) Klombur eru uttan um negativar upphæddir. Allar upphæddir eru í 1.000 kr.
2) Rakstrarvakst = (ársúrslit áðrenn rentur x 100) / nettosøla
3) Ognarvakst = (ársúrslit áðrenn rentur x 100) / ogn í alt
4) Gjaldføriseni = (ogn í umferð í kr x 100)/ stuttfreistuð skuld
5) Tryggleni = (eginpeningur í kr x 100) / ogn í alt

Ársfrágreiðing
Hesin ársroknskapurin hjá Telefonverkinum er í sniði og í innihaldi nógv broyttur í mun til undanfarnu árini. Umframt at innihalda sjálvan roknskapin og eina roknskaparliga frágreiðing, so er endamálið hjá lagdur á, at ársroknskapurin skal vera ein frágreiðing um gongdina og um framtíðarútlitini hjá Telefonverkinum og á telesamskiftisøkinum sum heild.

Ársroknskapurin vísir, at vit í 1996 hava havt ein vøkstur uppá 12,3 prosent í nettosøluni í mun til 1995. Hetta ber boð um økt virksemi, um støtri nýtslu á samskiftisøknum og um støtri krøv mótvegis Telefonverkinum. Økta virksemið hevur tó ikki havt við sær ein tilsvarandi vøkstur í ársúrslitinum og kemst hetta einahelst av øktum avskrivingum og øktum starvsfólkakostnaði samanborið við 1995.

Telefonverkið hevði sett sær stór mál fyri árið 1996, og í flest øllum høvuðsmálum eru vit komin væl áleiðis, og síggja vit fram til framhaldandi avbjóðingar í 1997. Tvey av hesum málum eru yvirtøka av uttanlandssamskiftinum og digitaliseringsætlanirnar.

Fleiri tænastur, sum til dømis Internet, vórðu í 1996 bjóðaðar viðskiftafólkinum, umframt at tær fíggjarligu og tøkniligu fortreytirnar fyri at fremja takstlækkingar á til dømis Internetinum og fartelefoni komu eisini væl áleiðis í 1996.

Kunningarsamfelagið
1996 var árið, tá m.a. orðini Internet, kunningarsamfelag og kunningartøkni vóru vanlig at hoyra í føroysku fjølmiðlunum, og Telefonverkið hevur havt sín náttúrliga leiklut í hesum. Í mun til ídnaðarsamfelagið, har tyngdin í búskapinum er í framleiðsluvinnuni, liggur tyngdin í kunningarsamfelagnum í innsavnan, viðgerð, sølu og flutningi av information ella kunning.

Tað er fyrst og fremst Telefonverkið, sum hevur til uppgávu at tryggja føroyska samfelagnum so góðar, bíligar og framtíðarbúskandi samskiftistænastur sum møguligt. Hesar eru avgjørdar fortreytir fyri eini haldgóðari menning av føroyska búskapinum sum heild og eitt føroyskt útgongumerki til altjóða kunningarsamfelagið.

Menningin fram ímóti føroyska kunningarsamfelagnum setur alsamt støtri krøv um nýhugsan, skjótleika og smidleika.

Vit vita, hvat uppgávan í framtíðini snýr seg um, men tað eru tríggjar høvuðsfortreytir, ið eru av ovurstórum týdningi, um vit skulu kunna loysa hesa uppgávu á bestan hátt. Telefonverkið má hava neyðugu teknifrøðina, neyðuga serkunnleikan og neyðugu fíggjarligu og lógarfrælsi kring seg at virka undir. Stór og týdningarmikil stig, so sum fyrireiking av yvirtøku av uttanlandssamskiftinum og arbeiðið við eini føroyskari telelóggávu, eru tikin í 1996, men enn er langt á mál.

Týdningarmikið er at gera sær greitt, at menningin á øllum telesamskiftisøkjum ikki er harmonisk og støðug. Á økjum sum til dømis vanligari telefoni, løggávu og partum av tøknifrøðini er menningin støðug. Innan onnur økí, til dømis Internet og fartelefoni, er talað um framhaldandi tøkniligar og marknaðarligar kollveltingar.

Fastlæstar langtíðarætlanir eru tí ikki altíð møguligar ella nøktandi á telesamskiftisøkinum, men tað er hinafturímóti ógvuliga týdningarmikið at vera smidligur og búgvin til nýggjar avbjóðingar.

Teldutøkni og samskiftistøkni fylgjast, og ofta kann vera ringt at skilja ímillum. Á marknaðarsíðuni er eisini ein menning í gongd, sum ger, at teldu-, samskiftis- og undirhaldsmarknaðirnir falla saman og geva nøring til fyribrigdir sum millum annað multimedia og Internet.

Aftanfyri menningina liggur eisini tann hugburður, at telesamskifti og kunningartøkni hava ment seg til at vera lyklafaktorar fyri samfelagsligu og búskaparligu menningina yvirhøvur. Teletænastur eru eitt virðismikið búskaparligt tilfeingi, og fjarskifti verður nett sum ein partur av og fortreyt fyri búskaparligari og sosialari menning bæði í framkomnum londum og triðja heiminum.

Telelóggáva

Tørvurin á at laga fjarskiftisvirksemið til broytta líggjarligu og marknaðarligu umstøðurnar hevur kravt stórar umskipanir í londunum kring okkum. Hetta hevur gjørt seg galdandi við sjálvum telelóggávunum; men eisini við umskipanum frá almennum stovnum við einkarrættarligum fortreytum. Í Føroyum varð arbeiðið at gera nýggja føroyska telelóggávu sett í gongd í 1996, og ætlandi verður hendan løgd fyrst Løgtingið í fyrra helvt av 1997.

Liberalisering

Ein nýggj telelóggáva fer at skapa kunnarour fyri liberaliseringum og harvið eini vaksandi kappingi mótvegis Telefonverkinum.

Gongdin í øðrum londum vísir, at áðrenn liberaliseringar av álvara taka seg upp, og kappingin mótvegis almennu einkarrættarhavarunum harðnar, verða hesir almennu stovnar gjørdir um til partafeløg - oftast fyrst til almenn partafeløg og síðani heilt ella lutvist við privatum kapitali uppí.

Liberalisering av marknaðinum setur stór krav til okkara kappingarføri. Tað er tí alneyðugt, at vit eisini í Føroyum kunnu skipa soleiðis fyri, at hendingarnar koma í rættu raðfylgju, tí við teimum verandi avmarkingunum í virksemi Telefonverksins kunnu vit ikki kappast á javnum føti við framtíðar kappingarneytar - føroyskar ella útlendskar.

Hinvegin metir Telefonverkið ikki, at kapping er av tí ringa, og vit eru fús at taka dystin upp á øllum økjum, til fromma fyri viðskiftafólkið, føroyska vinnulívið og føroyska samfelagið sum heild.

Yvirtøka

Ein høvuðsátturur í framtíðar virksemisinum og kappingarmøguleikunum hjá Telefonverkinum er knýttur at yvirtøkur av uttanlandssamskiftinum. Um Telefonverkið skal verða fort fyri at virka sum ein vanligur altjóða teleoperatørur, er neyðugt við eini føroyskari yvirtøku av uttanlandstelefoniini. Tað er okkara vón, at hesi mál verða løyst í 1997.

Samstarv

Ein týdningarmikil liður í at betra virksemi Telefonverksins er at økja samstarvið við aðrar partar. Ikki minst í einum umhvørvi, sum alt meira verður merkt av kapping, er avgerandi, at vit mugna at noyta teir samstarvsmøguleikar, sum eru. Árið 1996 var eisini merkt av øktum samstarvi við millum annan SEV um tíðurspenningir, við Kunningarnarnastuna um telefonbókina, við Sjónvarp Føroya umframt tær tríggjar telefyrilok-

urnar TeleDanmark, Postur & Sími og Tele Greenland. Aftrat hesum hevur Telefonverkið gott samstarv við kommununnar, Landsverkfrøðingin og onnur.

Bygnaður og starvsfólkapolitikkur
Í 1996 varð nýggj leiðsla sett á Telefonverkinum, og hevur hon m.a. broytt bygnaðin á stovninum - tann nýggi bygnaðurin sæst aftast í ársroknskapinum. Høvuðsendamálið við bygnaðarbroytingunum var at betra møguleikarnar at loysa tær uppgávur og avbjóðingar, sum vit hava fyri framman, umframt at styrkja kunda- og marknaðarrættaðu síðurnar á Telefonverkinum. Bygnaðar- og leiðslubroytingarnar hava til tíðir verið ørkymlandi fyri tey umleið 180 starvsfólkini á Telefonverkinum.

Tann skjóta tøknifrøðiligu menningin setur stór krøv til starvsfólkið, og varð tí ein arbeiðsbólkur settur í 1996 at arbeiða við at leggja ein starvsfólkapolitikk til rættis. Ein høvuðsuppgáva í hesum er at fáa eina nýggja fyrireiking av eftirútbúgving av starvsfólki og øðrum skeiðvirksemi í framtíðini.

Í 1996 varð eisini farið undir at geva eitt starvsfólkablað út, sum er vorðið ein natúrligur partur av samskiftinum millum starvsfólkið.

Kommunuvalið
Vegna landafrøðiligu umstøðurnar í Føroyum er trupult og kostnaðarmikið at senda sjónvarpssendingar beinleiðis úr økjunum kring landið. Á fundi 17. oktober 1996 spurdi Sjónvarp Føroya tí, um tað í samhandi við kommunuvalið var møguleiki at samsenda tvð ymisk valhøli kring landið. Telefonverkið helt hetta vera eina spennandi og avbjóðandi uppgávu og fór beinan vegin undir at kanna møguleikarnar.

Tað vísti seg, at hetta kundi lata seg gera. Brúktur vórðu triggjar ymiskar loysnir, og til dømis varð úr Klaksvík sent yvir fylgisvein til Havnar. Útgerðin varð leigað frá TeleDanmark og kom til landið eina viku undan valinum, og beinanvegin fóru fólk frá Telefonverkinum og SVF undir at seta útgerðina upp. Parabolurin kom dagin fyri, og klárt var at senda fáar tímar, áðrenn sendingin hjá SVF skuldi byrja, so spenningurin var stórur, tá sjónvarpsmaðurin í Klaksvík fyri fyrstu ferð í eini beinleiðis sending greiddi frá støðuni í valhøllinum.

Flest øll munnu vera sannd um, at tiltakið eydnaðist væl, og at betri møguleiki í framtíðini verður fyri at samansjóða landið í eina heild.

Útlit
Hóast nógv er hent tað undanfarna árið, og uppaftur metra er sett í gongd, so økjast krøvini um tænastuhelgingar og takstlækkingar eisini alsamt skjótari. Avleiðingin er, at vit, so skjótt sum til ber, skulu betra okkara kappingarføri.

Vit skulu framhaldandi laga okkum til broytingar í umhvørvinum og uppaftur betri - vit skulu vera við til at skapa okkara egnu framtíð - skapa marknaðin.

Málsetningar Telefonverksins fyri 1997 snúgva seg í høvuðsheitum um at vaksa um kappingarføri. Av fortreytum fyri at náða hetta er:

- ein føroysk yvirtøka av uttanlandssamskiftinum
- ein framskundað digitalisering av telesamskiftiskervinum
- at vit megna at bjóða nýggjar tænastur út til gagns fyri viðskiftafólkið, samstrondis sum vit kunnu varðveita eina skilagóða figgjarliga menning av Telefonverkinum og góð og stimbrandi arbeiðsviðurskifti fyri starvsfólkið.

Kundusamskifti
Ein av størstu uppgávunum hjá Telefonverkinum verður at økja tænastustøðið mótvegis viðskiftafólkunum og geva teimum bestu tænasturnar og bestu samskiftisloysnirnar. Á einum kanandi fráum teletmarknaði er tað týdningarmikið, at Telefonverkið er á odda í kappingini um telemarknaðin í Føroyum, so grundarlagið fyri Telefonverkinum ikki hvørvur. Ásannandi, at Telefonverkið er til fyri viðskiftafólkið, verður arbeitt miðvíst við at skipa samskiftið við viðskiftafólkini í tríggjar eindir Telebúðir, tænastumiðstøð og virkisráðgeving.

Telebúðir
Telebúðirnar skulu taka sær av persónliga sambandinum við allar kundabólkar. Væntandi eru tað fyrst og fremst privatkundar, sum venda sær til Telebúðirnar. Telebúðirnar skulu veita viðskiftafólkunum tær tænasturnar, tørvur er á í sambandi við telesamskifti.

Telebúðirnar skulu næstu árini mennast til at vera ein sjálvstøðug virkiseind, við egnum búskapi, sum kappast á jøvnum føti við aðrar fyritøkur. Sjey Telebúðir eru longu kring oyggjarnar, og røkka hesar øllum kundum hjá Telefonverkinum.

Í 1996 varð langtíðarætlan fyri Telebúðirnar løgd, har framtíðin varð sett út í kortið.

Telebúðin í Havn, sum helt til í hølunum hjá Telefonverkinum á Hálsi, flutti í juni 1996 oman í miðbýin fyri at vera nærri kunduntum og økti harvið tænastustøðið munandi, samstundis sum vøru- og tænastuútboðið eisini øktist. Í desember 1996 læt Telebúðin í Klaksvík upp í sjálvstøðugum hølum, og í mai 1997 er ætlanin, at nýggj Telebúð skal lata upp í Miðvági.

Tænastumiðstøð
Tænastumiðstøðin verður staðið, har viðskiftafólkini hava møguleika fyri at ringja um allar samskiftistrupulleikar. Starvsfólkini á tænastumiðstoðini skulu vera fær fyri at svara øllum vanligum fyrispurningum, ella finna tey starvsfólk, ið kunnu loysa ftøkiligar uppgávur.

Fyrireikingarnar til tænastumiðstøðina byrjaðu av álvara í 1996. Ein arbeiðsbólkur varð settur at arbeiða við málinum. Málið er ein fult útbygd tænastumiðstøð í 1998. Fyrsta stigið verður at flyta verandi borðsalin niðan á Telestøðina. Næsta stigið verður at útbyggja tænastustøðið við nýggjari tøkni og større vitan hjá starvsfólkunum.

Virkisráðgeving
Fyrireikingar til eina virkisráðgeving byrjaðu í 1996, men ráðgevingin kemur ikki at virka fyrr enn í 1997. Virkisráðgevingin skal fyrst og fremst nøkta samskiftistørvin hjá føroyska vinnulívinum. Telefonverkið hevur nógvar deildir, sum hvør hevur servitan á síntam øki. Tað kann tí vera ringt hjá virkjunum at vita, hvørjar tey skulu venda sær við einum samskiftistørvi. Tað kemur eisini ofta fyri, at fleiri deildir skulu arbeiða saman um at fremja eina heildarloysn hjá virkjunum. Fyri at lætta um hetta arbeiðið er ætlanin, at virkisráðgevingin skal samskipa arbeiðið hjá ymisku deildunum á Telefonverkinum í mun til tørvin hjá virkiskundanum.

Grundtænasturnar
Eitt av grundleggjandi málunum hjá Telefonverkinum er at veita føroyingum eitt dygdargott og álítandi telesamskifti innanlands og við útheimin. Innan eina tøkni, har broytingar henda við ferð, krevur tað stórar fløgur og nógva orku at fylgja gongdini, og støðugt er neyðugt at raðfesta millum ymiskar fløgur til tess at miðsavna orkuna, har størstur tørvur er. Eitt, ið ger trupulleikan større fyri Telefonverkið í mun til líknandi fyritøkur í øðrum londum er, at sjálvt um felagatalið er munandi minni, er tørvurin á tænastum tann sami sum í øðrum londum. Manningin, ið skal fremja tøkniligu broytingarnar, og felagatalið, sum skal gjalda fyri tænasturnar, eru tó munandi minni.

Fastnet
Kjarnin í telesamskiftinum er fasta netið, sum í dag umfatar umleið 22.900 felagar. Av teimum eru umleið 12.000 felagar undir digitaliseraðum støðum, og svarar tað til 60 prosent av samlaða felagatalinum, meðan restin er tilknýtt automatiseraðum analogstøðum. Sum vit siggja á myndini omanfyri stavaðu 68 prosent av nettosøluni frá fastnetinum í 1996.

Eingin nýggjur felagi varð digitaliseraður í 1996, men stórur partur av 1996 fór við at leggja ætlanir og fyrireika komandi digitaliseringina - millum annað vóru kaðalar drignir úr støðini í Klaksvík niðan á Brúnaskarð, umframt at kaðal er drigin av Skriðuhjalla omanfyri Leirvík omman til støðina í Leirvík og gjøgnum Leirvíksbergholið til Gøtudal.

Málið fyri 1996 má sigast at vera rokkið, hóast viðskiftafólkini ikki beinleiðis hava merkt hetta. Digitaliseringin í 1997 fer eftir ætlanini at umfata Fuglafjørð, Gøtu, Leirvík og Søldarfjørð, í 1998 Norðuroyggjar og Runavík og í 1999 restina av landinum.

Fartelefoni
Fartelefoni er eitt av teimum økjunum, har størstu broytingarnar henda. Fartelefonfelagatalið økist í stórum, útbreiðsluøkini verða større, tøknin mennist, og prísirnir lækka skjótt um allan heimin. Á einum marknaði, har broytingarnar henda skjótt, ræður um at halda eina stinna kós og tryggja, at gjørdu fløgurnar eru burðardyggar.

Telefonverkið umsitur tvær analogar fartelefonskipanir, NMT 450 og NMT 900. NMT 450 skipanin varð tikin í nýtslu í januar 1989. NMT 450 útbreiðslan fevnir um stóran part av landinum og stóran part av havleiðunum. Skipanin riggar væl og er álitið hjá nógvum føroyingum bæði á sjógvi og á landi. Vansin við NMT 450 skipanini var, at telefonirnar vóru stórar og prísurin høgur. Tá NMT 900 skipanin varð tikin í nýtslu í juli 1992, varð avgjørt at nýta hesa skipanina í størstu býum og bygdum.

Nógv lond rundan um okkum nýta digitalar fartelefonskipanir, sum til dømis GSM, og trýstið á Telefonverkið fyri at fáa eina tílíka skipan í Føroyum hevur verið stórt. Trupulleikin er, at ein slík skipan er sera fløgukrevjandi, og neyðugt er at raðfesta millum fløgur í fasta telefonnetið ella fartelefonnetið. Av tí at tvær vælvirkandi fartelefonskipanir eru í Føroyum, og verandi fasta netið krevur áboðtur, hevur Telefonverkið valt eina ódýra útbygging av NMT 900 kervinum, og í staðin framskundað digitaliseringina av fasta netinum, sum kemur større parti av landinum til góðar.

Aðrar tænastur
Telefonverkið bjóðar eisini viðskiftafólki sínum aðrar tænastur enn fastnet- og fartelefoni. Hetta eru tænastur sum til dømis Internet, vekslarar, dataflutningur og ISDN. Málið við hesum tænastum er at fáa so stórt gagn burtur úr verandi telekervinum sum møguligt og at gagnnýta tey anboð, sum hesar tænastur geva møguleika fyri. Málið er at geva viðskiftafólkunum møguleika fyri effektivum telesamskifti og at geva føroyska vinnulívinum gott samskiftisgrundarlag fyri at vinna pening til landið.

Internet
Internetið er eitt av teimum økjunum, sum eru í stórum vøkstri. Internetið fer at broyta gerandisdagin hjá nógvum føroyingum framyvir. Atgongdin til vitan verður nærstan óavmarkað, og møguleikin fyri at samskifta við onnur verður munandi betri enn higartil. Málið hjá Telefonvetkinum er, at allir føroyingar kunnu fáa nyttu av eini vælvirkandi Internettænastu.

Internettænastan varð sett á stovn í mars 1996. Vøksturin í felagaltalinum hevur verið stórur, og sambandið av landinum hevur ofta verið hart strongt, og neyðugt verður at útbyggja orkuna í næstum.

Útlitini fyri 1997 eru góð, tí alt fleiri gerast greið yvir, hvørjar møguleikar Internetið gevur. Væntandi er, at

felagatalið fer at vaksa nógv í 1997, tá nýggjar tænastur so sum »Home Banking« verða bjóðaðar viðskiftafólkunum.

Ætlanir eru um at lækka gjøldini í sambandi við Internettænastuna.

Telefontænastur
Telefonverkið bjóðar eitt fjølbroytt úrval av sjálvvaldum telefontænastum. Vøkstur hevur verið í nýtsluni av hesum tey seinastu árini, og væntandi fer nýtslan at økjast munandi, tá digitaliseringin verður víðkað. Eisini er ætlanin framhaldandi at víðka tænasturnar.

Útleiga av fartelefonum
Ásannandi at føroyingar ikki hava sama primera fartelefonskipan sum nógv onnur lond í heiminum, og at fólk alla hava tørv á at hæna telefontr í stytri tíðarskeið, stovnaði Telefonverkið í 1995 eina útleiguskipan fyri fartelefonir. Til tíðir hevur eftirspurningurin verið so stórur, at telefonirnar ganga undan. Skipanin verður endurskoðað á vári 1997, og ætlanin er at víðka hesa skipan í tann mun, tørvur er á tí.

Internetsambandið ríkar undirvísingina á Kambsdali
Føroya Handilsskúli á Kambsdali stovnaði í 1996 eitt teldutlokk, har hvør næmingur hevur eina farteldu, sum verður nýtt í undirvísingini. Tað var tí sjálvsagt, at hesin flokkurin royndi internetið sum ein aktivan part av undirvísingini. Ein avtalu varð gjørd millum Telefonverkið og Handilsskúlan, har næmingar og lærarar fingu lagaliga atgongd til internetið. Afturfyri skal Handilsskúlin eftirmeta royndirnar, so greiða kann fáast á, hvørja ávirkan internetið hevur á undirvísingina. Ætlanin er, at aðrir stovnar og skúlar eisini skulu fáa gagn av roynduntm.

Eingin niðurstøða er gjørd enn, men internetið hevur verið væl móttikið av næmingunum, og tað munnu vera fáir næmingar á Handilsskúlanum, sum ikki eru dagligir gestir á internetinum.

Telefonverkið og vinnulívið
Nógv fyrireikandi arbeiði hevur verið gjørt í 1996 fyri at betra tænasturnar til vinnulívið. Nógvir av teimum miðalstóru vekslarunum eru skiftir út í árinum, og í 1997 verður farið undir teir stóru vekslarnar, umframt at ein stórur partur av teimum smáu vekslarunum støðugt verður úskiftur til meira nútímans skipanir.
Telefonverkið hevur í 1996 bygt upp eitt nýmótans datafluttningskervi, ið ger tað lættari at gera samskiftisskipanir til virkini.

Nógvir fyrispurningar hava verið eftir ólíkum samskiftisskipanum til at knýta saman lokalnet og til skjótari tilknýti til eitt nú Internetið. Ætlanin er í 1997 at fara undir at bjóða viðskiftalólki tilknýti til eitt sokallað alment routaranet, ið ger samskiftið millum virkir og stovnar munandi lættari og tryggari.

Sum áður nevnt verður arbeitt við at digitalisera støðirnar kring landið, so vanliga telefonsamskiftið verður betri. Hetta førir tó ikki við sær, at sjálv telefonin hjá hvørjum einstøkum felaga verður digital, men ISDN skipanin ger hetta møguligt. Fyri felagan merkir hetta eina stóra øking í tænastunum, og telefonirnar fáa fleiri hentleikar.

Arbeitt varð í 1996 við at byggja ISDN netið upp. Tíu minni roynd arsentralur varð riggaðar til, og útvaldir felagar fingu møguleika at royna skipanina, sum tykist at rigga væl. Td. hevur Íltvarp Føroya roynt tøknina við góðum úrsliti. Ætlanin er í 1997 at bjóða tænastuna út til virki við serligum samskiftistorvi og tey komandi árini at byggja skipanina út til eina veltrkandi tænastu.

Royndir hava verið gjørdar við sokalladum videofundi í 1996. Serliga royndin at nýta skipanina innan telemedisin var væleydnað, men eisini fundarvirksemi millum lond hevur áhuga. Til at skipa fyri videofundi verða nýttar ISDN-linjur, og í 1997 verður marknaðarføringin av hesum tænastum samskipað.

Telefonbókin
Í 1996 tók Telefonverkið stig til at geva telefonbókini ein nýggjan hamn. Samstarv varð tikið upp við Kunningartænastuna, sum higartil hevur givið Gulu síðurnar út, fyrt at gera eina telefonbók, sum í enn størri mun kann vera eitt hent uppsfagsverk hjá føroyingum. Talan var um eitt heilt nýtt verk, og sum vanligt í slíkum førum, var tað stórarbeiði at skipa telefonbókina av nýggjum. Um ársskiftið 1996/97 var arbeiðið komið væl áleiðis, og verður nýggja telefonbókin send felagunum fyrsta ársfjórðing 1997.

Viðmerkingar til ársroknskapin

Framleiðsluvirði
Framleiðsluvirðið, ið umfatar nettosølu, arbeiði fyri egna rokning, broyting av arbeiði í gerð fyri fremmanda rokning og aðrar rakstrarinntøkur, øktist úr 151.494 tkr. í 1995 upp í 160.502 tkr. í 1996.

Nettosøla

1994	1995	1996
128.052	131.264	147.363

Nettosølan øktist við 16.099 tkr. frá 1995 til 1996. Stórur partur av vøkstrinum stavar frá sjálvvaldum samtalum og kemst av einum broyttum avrokningarhátti av uttanlandssamskiftinum millum Telefonverkið og TeleDanmark (1996 avtalan).

1996-avtalan
Fyri 1. januar 1996 hevði TeleDanmark allar skyldur og allan ágóðan av uttanlandssambandinum til Føroya og úr Føroyum. Telefonverkið hevur tó í øll hesi árini rekt uttanlandssambandið fyri TeleDanmark sum entreprenørur.

Frá 1. januar 1996 eru avrokningarviðurskiftini við TeleDanmark broytt í mun til avtalurnar frammanundan. Avtalan merkir fyri Telefonverkið ein munandi bruttoinntøkuvekstur av uttanlandssamskiftinum, men merkir samstundis ein munandi útreiðsluvøkstur, við tað at Telefonverkið yvirtekur ábyrgd og rakstur av flestu anleggum, sum TeleDanmark áður hevði raksturin av í Føroyum.

Ein avleiðing av nýggju avrokningarháttunum sæst eisini aftur í Arbeiði fyri fremmanda rokning, sum er minkað úr 14.476 tkr. í 1995 til 6.681 tkr. í 1996.

Sjónvarps- og útvarpssendinetið
Fyri 1996 hevði Telefonverkið ábyrgdina av rakstrinum av sjónvarps- og útvarpssendinetinum vegna Sjónvarp Føroya og Útvarp Føroya, sum entreprenørur. Hetta er broytt í 1996.

Telefonverkið fekk í 1996 fyri fyrstu ferð eina samlaða játtan á Fíggjarløgtingslógini til rakstur av og íløgur í sjónvarps- og útvarpssendinetið, 3.500 tkr. vóru avsettar til rakstur og 2.500 tkr. til íløgur. Hesar upphæddir eru partar av nettosøluni, í tann mun arbeiðið er liðugt og fakturerað.

Radioeftirlitið
Telefonverkið rekur vegna Telestyrelsen Radioeftirlitið í Føroyum, sum entreprenørur. Serstakur roknskapur verður gjørdur fyrt Radioeftirlitið, og hesin vísir umleið 1.500 tkr. í samlaðum inntøkum.

Vørusølan
Ein annar partur av vøkstrinum í nettosøluni stavar frá vørusøluni, sum vaks við 2.568 tkr. upp í 9.372 tkr. Økingin kemst av, at Telebúðirnar høvdu størri sølu í 1996, umframt at Telefonverkið í størri mun er farið at selja vekslarar heldur enn at leiga teir út.

Arbeiði fyri egna rokning

1994	1995	1996
18.731	16.314	7.844

Orsøkin til minkingina í arbeiði fyri egna rokning er, at Telefonverkið sum heild hevur gjøn færri íløgur í 1996 enn undanfarin ár.

Aðrar rakstrarinntøkur

1994	1995	1996
1.603	2.640	6.282

Av øðrum rakstrarinntøkum eru 6.154 tkr. inntøka í sambandi við, at Telefonverkið rekur Neyð og Trygd vegna TeleDanmark. Fyri 1996 var hetta ein partur av arbeiði fyri frenmanda rokning í nettosøluni.

Aðrar rakstrarinntøkur í 1995 uppá 2.640 tkr. vóru millum annað húsaleiguinntøka í Tjørnuvík, har Cantat kaðalin kemur upp á land, og transmissión Tórshavn-Tjørnuvík. Hesar innøkur fullu burtur í sambandi við broytta avrokningarháttin.

Kostnaður

Kostnaður av støðisogn

1994	1995	1996
20.585	15.802	18.261

Kostnaður av støðisogn vaks í 1996 við 2.459 tkr. í mun til 1995.

Ein stórur partur av hesum vøkstrinum stavar frá øktari ravmagnsnýtslu til millumbylgjusendaran á Akrabyrgi, í sambandi við at Telefonverkið í 1996 yvirtók raksturin frá Føroya Landstýri. Hesin kostnaður er inntøkudekkaður fyri Telefonverkið, sum greitt er frá í partinum um nettosøluna.

Annar kostnaður

1994	1995	1996
12.202	9.070	9.743

Annar kostnaður hevur verið rættiliga stabilur. Áður vórðu smáamboð yvir 10 tkr. ogn arført. Hetta markið er nú hækkað til 30 tkr., og viðførir ein meirkostnað í rakstrinum uppá tilsamans 1.300 tkr.

Starvsfólkakostnaður

1994	1995	1996
41.651	42.269	47.939

Starvsfólkakostnaðirnir í 1994 og 1995 kunnu ikki beinleiðis samanberast, orsakað av broyttum uppgerðarhátti. Fyrra hálvárið 1994 vóru lønarútreiðslur til arbeiði fyri egna rokning og arbeiði fyri frenmanda rokning beinleiðis yvir liggjarstøðuna. Hetta vóru alt 5.642 tkr. Frá 1995 fara hesar lønarútreiðslur yvir raksturin. Starvsfólkakostnaðurin í 1996 var sostatt áleið tann sami sum í 1994.

Tann lági starvsfólkakostnaðurin í 1995 stavar frá spardum lønarútreiðslum vegna verkfall, og at tað vóru færri starvsfólk í 1995 í mun til 1996.

Nógv orka varð í 1996 brúkt til at styrkja ymiskar funktiónir á Telefonverkinum. Her kann til dømis nevnast Internet, Telebúðir, marknaðarføring og starvsfólkaarbeiði, og sæst hetta allur í starvsfólkavokstrinum í 1996.

Avskrivingar av materiellari støðisogn

1994	1995	1996
34.590	32.118	37.796

Sum talvan vísir, eru avskrivingar av materiellari støðisogn økt**ar** við 5.678 tkr. í mun til 1995. Økingin stavar lutvíst frá, at avskrivingarnar í 1995 vórðu lækkaðar við 2.395 tkr. orsakað av eini javning av virði á støðisogn, og at avskrivingar fyri eitt heilt ár eru framdar í 1996 av stórum fløgum, ið vóru lidnar í seinnu helvt av 1995.

Rentur (netto)

1994	1995	1996
15.603	13.424	11.371

Av tí at skuldin er minkað og rentustøðið lækkað seinnu árini, er rentukostnaðurin minkaður í 1996.

Ársúrslit

1994	1995	1996
10.439	21.407	17.938

Úrslitið í 1996 var 17.938 tkr. í mun til 21.407 tkr. í 1995. Henda lækking stavar einahelst frá øktu avskrivingunum, sum nevnt frammanundan. Ársúrslitið verður flutt fram til komandi rokniskaparár.

Eginpeningur

1994	1995	1996
31.415	52.822	70.760

Eginpeningurin er tvífaldaður tvey tey síðstu árini.

Lániskuld

1994	1995	1996
184.926	156.294	128.988

Langfreistaða skuldin varð í 1996 avdrigin við 27.307 tkr. Restskuldin 31. desember 1996 var 128.987 tkr. Avdráttirnir í 1997 verða væntandi 41.336 tkr. Orsøkin til hesa lækking er, at Telefonverkið í 1995 og 1996 fekk útsett avdráttirnar á trimum lánum. Hesir avdráttir, umframt teir vanligu, skulu gjaldast aftur komandi tvey árini.

Langfreistaða skuldin verður 25.774 tkr. um 5 ár.

Peningastreymur

1994	1995	1996
5.347	8.819	25.246

Tøkt peningurin er økt**ur** við 16.427 tkr., og eru høvuðsorsøkirnar, at fremi fløgur vóru gjørdar og fíggjarkostnaðurin var lægri.

Týdningarmiklar hendingar

Áðurnevnda 96-avtala millum Telefonverkið og TeleDanmark varð tann 2. apríl samtykt av Føroya Løgtingi, og sostatt manglar einans at hon verður staðfest av Løgmanni í Kunngerðarblaðnum.

Roknskaparátekning leiðslunnar
Stjórnin hevur viðgjørt og viðtikið ársroknskapin og ársfrágreiðingina.

Vit meta, at tær nýttu roknskaparreglurnar eru hóskandi, soleiðis at ársroknskapurin gevur eina rættvísandi mynd.

Viðmerkjast skal, at inntøkur og útreiðslur viðvíkjandi uttanlandssamskifti eru íroknaðar roknskapinum sambært avtalum við Tele Danmark. Hesar avtalur eru góðkendar av Føroya Løgtingi 2. apríl 1997, men ikki staðfestar av Løgmanni í Kunngerðarblaðnum.

Tórshavn hin 7. apríl 1997
Andras Róin
Stjóri
(Managing Director)

Grannskoðanarátekning
Vit hava grannskoðað tann av leiðsluni gjørda ársroknskapin fyri 1996 fyri Telefonverk Føroya Løgtings.

Framda grannskoðanin
Vit hava fyrireikað og framt grannskoðanina í samsvari við vanligar góðkendar grannskoðanarreglur við atliti til at fáa eina grundaða samføring um, at ársroknskapurin ikki inniheldur týðandi feilir og manglar. Út frá eini meting um týdning og vanda hava vit undir grannskoðanini eftirkannað grundarlagið og skjalprógvað undir teimum í ársroknskapinum uppsettu upphæddum og upplýsingum annars. Í hesi hava vit tikið støðu til nýttu roknskaparreglurnar og roknskaparligu metingarnar og hava mett, um upplýsingarnar í ársroknskapinum sum heild eru nøktandi.

Grannskoðanin hevur ikki givið orsøk til fyrivarni.

Supplerandi upplýsingar
Víst verður til tað í ársfrágreiðingini nevnda um 1996 avtaluna við Tele Danmark.

Niðurstøða
Okkara fatan er, at ársroknskapurin er greiddur úr hondum í samsvari við krøvini í lóggávuni um roknskaparframleigu, og at ársroknskapurin gevur eina rættvísandi mynd av ogn, eginpeningi, avsetingum og skuld stovnsins, tí fíggjarligu støðuni og úrslitinum.

Tórshavn, hin 7. apríl 1997
KPMG Pauli Ellefsen P/F
Pauli Ellefsen
Statsaut. revisor
State Authorized Public Accountant

Nýttar roknskaparreglar
Ársroknskapurin fyri Telefonverk Føroya Løgtings er gjørdur eftir somu roknskaparreglum sum undanfarin ár.

Hóast Ársroknskaparlógin ikki er galdandi fyri stovnin, er roknskapurin tilfarsgaður uppsetingunum í ársroknskaparlógini fyri partafeløg v.m., og talva C sum skuld og talva A fyri fíggjarstøðu eru nýttar sum grundarlag.

Rakstrarroknskapurin
Inntøkur og kostnaður eru í størst møguligan mun tíðargreinaðar til bess at fevna um árið 1996. Hetta merkir, at skyldugur kostnaður verður avsettur sum skuld, og at kostnaður goldin frammanundan verður upptørdur sum ogn.

Nettosøla
Inntøkur frá sølu av vørum og tænastum verða tiknar við í rakstrarroknskapin, um fakturering er farin fram fyri ársslok. Sjálvvaldar samtalur verða avlisnar og skrásettar hvønn ársfjórðing aftursút og í hesum sambandi inntøkuførdar.

Arbeiði fyri egna rokning upptikin sum støðisogn
Arbeiði fyri egna rokning upptikin sum støðisogn fevna bæði um lidnar og ikki lidnar íløgur.

Kostnaður av støðisogn
Kostnaður av støðisogn fevnir um allan kostnað, herundir leigu, el og hita, av teimum bygningum, maskinum og ikførum v.m., sum verkið nýtir.

Anuar rakstrarkostnaður
Rakstrarkostnaður fevnir um allan annan rakstrarkostnað.

Óvanligar inntøkur og útreiðslur
Óvanligar inntøkur og útreiðslur fevna um uppheddir, ið eru óvanligar og ikki afturvendandi, og sum ikki hava nakað við vanliga raksturin at gera.

Materiell støðisogn
Materiell støðisogn verður virðissett til útveganar-/kostpris við frádrátti av samlaðum gjørdum roknskaparligum av- og niðurskrivingum. Útveganar-/ kostprísurin er íroknaður møguligar rentur og aðrar útreiðslur av fløguni, til hon verður tikin í nýtslu.

Avskrivingin er eins stór fyri tey einstøku roknskaparárini og er sett út frá mettu brúkstíðini fyri materiellu støðisognina.

Tey nýttu avskrivingartíðarskeiðini eru:

Bygningar og grundøki	50 ár
Kaðalar	15 ár
Støðir	10 ár
Radiostøðir	10 ár
Innbúgv og akfør	5 ár
EDV-tól	4 ár

Støðisogn í gerð verður eins og undanfarin ár ikki avskrivað.

Útveganir, sum hvør sær kosta minni enn 30 tkr., verða frá 1996 útreiðsluførdar í útveganarárinum undir øðrum kostnaði.

Fíggjarlig støðisogn
Fíggjarlig støðisogn verður upptikin til útveganarvirði.

Partabrøv í dóturfelagnum eru niðurskrivað til 0 kr.

Vørugoymslur
Vørugoymslur og arbeiði í gerð verða upptikin til ávikavist útveganar- og kostprís.

Liðugtvørur og hjálpitilfar verða upptikin til vigaðan miðalprís, fróknað frakt og toll. Niðurskrivingar vegna aldur og aðrar orsøkir til ókurans verða gjørdar so hvørt.

Arbeiði í gerð fyri fremmanda rokning verða upptikin í liggjarstaðnum til løn, útlar og annan kostnað.

Áogn
Áogn verður upptikin til áljóðandi virði við frádrátti av niðurskriving ímóti tapi. Avsetingin verður gjørd undir einum.

Fremmant gjaldoyra
Áogn og skuld í fremmandum gjaldoyra verða umroknað til føroyskar krónur út frá kursinum við roknskaparársslok.

Valutakurstap og -vinningar verða tikin við í rakstrarroknskapin, undir rentum.

Skattir
Telefonverkið er ikki skattskyldugt.

Í taluppsetingunum verða nýttar klombur utan um negativ úrslit og frádráttaupphæddir. Allar upphæddir eru í 1.000 kr. (tkr.).

Rakstrarroknskapur fyri 1. januar 1996 til 31. desember 1996

		1996	1995
Nota 1	Nettosøla	147.363	131.264
	Broyting av arbeiði í gerð fyri fremmanda rokning	(987)	1.276
	Arbeiði fyri egna rokning uppt. sum støðisogn	7.844	16.314
	Aðrar rakstrarinntøkur	6.282	2.640
	Framleiðsluvirði	160.502	151.494
	Útreiðslur til rávøru og hjálpitilfar	(17.454)	(17.404)
Nota 2	Kostnaður av støðisogn	(18.261)	(15.802)
Nota 3	Annar rakstrarkostnaður	(9.743)	(9.070)
	Bruttovinningur	115.044	109.218
Nota 4	Starvsfólkakostnaður	(47.939)	(42.269)
	Úrslit áðrenn avskrivingar	67.105	66.949
	Avskrivingar av materiellari støðisogn	(37.796)	(32.118)
	Úrslit áðrenn rentur o.a.	29.309	34.831
	Rentuinntøkur og tílíkar inntøkur	604	1.713
	Rentukostnaður og tílíkt	(11.975)	(15.137)
	Ársúrslit	17.938	21.407

Fíggjarstøða tann 31. desember 1996

	Ogn	1996	1995
Nota 5	Materiell Støðisogn		
	Bygningar og grundøki	50.627	51.782
	Kaðalar, støðir og radio	107.929	134.024
	Innbúgv. akfør. EDV og onnur rakstrartól	9.652	8.085
	Støðisogn í gerð	3.176	3.804
		171.384	197.695
Nota 6	Fíggjarlig støðisogn		
	Peningafløgur í atknýtt virki	0	0
	Onnur virðisbrøv	99	99
	Støðisogn alt	171.483	197.794
	Ogn í umferð		
	Vørugoymslur		
	Liðugtvørur og hjálpitilfar	12.278	11.433
	Arbeiði í gerð fyri fremmanda rokning	1.147	2.134
		13.425	13.567
Nota 7	Áogn		
	Áogn av sølu	23.311	22.902
	Áogn, atknýtt virki	3.304	5.337
	Tíðargreinan	809	963
	Tøkur peningur	25.246	18.819
	Ogn í umferð alt	66.095	51.588
	Ogn í alt	237.578	249.382

	Eginpeningur og skuld	1996	1995
	Eginpeningur		
	Eginpeningur við ársbyrjan	52.822	31.415
	Úrslit frá rakstri	17.938	21.407
	Eginpeningur alt	70.760	52.822
	Skuld		
Nota 8	Langfreistað skuld		
	Útlendskir lánistovnar	59.596	99.676
	Ileggingargrunnurin fyri Føroyar	28.056	30.833
		87.652	130.509
	Stuttfreistað skuld		
	Avdráttir av langfreistaðari skuld,		
	sum falla til gjaldingar komandi ár	41.336	25.785
	Skuld til peningastovnar	2.352	3.764
	Goldið fraintanundan frá telefonfelagum	4.487	4.865
	Vøru og tænastuskuld	11.658	14.870
	Onnur skuld	19.333	16.767
		79.166	66.051
	Skuld alt	166.818	196.560
	Eginpeningur og skuld	237.578	249.382

Nota 9 **Møguligar skyldur**

Yvirlit yvir peningastreymum

Peningastreymur frá rakstri	1996	1995
Inntøkur alt	160.502	151.494
Kostnaður alt	(93.397)	(84.545)
Peningastreymur frá rakstri áðrenn broytingar í stuttfreistaðari ogn og skuld	67.105	66.949
Broyting í vørugoymslum	141	(865)
Broyt.í áogn og goldið frammanundan frá telefonfelagum	1.401	3.818
Broyting í vøru- og tænaskuld og aðrari skuld	(646)	(697)
Peningastreymur frá vanligum rakstri	68.001	69.205
Rentur í rakstri, netto	(11.370)	(13.424)
Peningastreymur frá rakstri	56.631	55.781
Íløgur í materiella støðisogn	(11.485)	(18.658)
Íløgur í fíggjarliga støðisogn	0	0
Peningastreymur nýttur til íløgur	(11.485)	(18.658)
Avdráttir av lánum	(27.307)	(28.632)
Skuld til peningastovnar	(1.412)	(5.019)
Peningastreymur frá fígging	(28.719)	(33.651)
Ársins peningastreymur frá rakstri, íløgum og fígging	16.427	3.472
Tøkur peningur við ársbyrjan	8.819	5.347
Tøkur peningur við ársenda	25.246	8.819

Nota 1 **Nettosøla**

Nettosølan kann sundurgreinast soleiðis:	1996	1995
Sjálvvaldar samtalur	91.328	67.833
Felagagjøld	23.104	23.003
Stovningargjøld	1.783	1.683
Inleggingargjøld	1.512	1.570
Sergjøld	800	847
Leiga av linjum, vekslarum v.m.	6.800	7.257
Vørusøla	9.372	6.804
Arbeiði fyri fremmanda rokning	6.681	14.476
Telefonistavgreiddar samtalur	3.192	4.930
Fjarrit	875	928
Ymsar inntøkur	1.916	1.933
	147.363	131.264

Nota 2 **Kostnaður av støðisogn**

Kostnaður av støðisogn kann sundurgreinast soleiðis:	1996	1995
Ravmagn	5.350	3.816
Leigukostnaður	2.766	2.566
Tryggingar	486	441
Bensin og olja	705	677
Aðrar entreprenørveitingar	5.540	5.649

Tænastuavtalur	3.292	2.559
Reingerð og renovatión	122	94
	18.261	15.802

Nota 3 **Annar kostnaður**

Annar kostnaður kann sundurgreinast soleiðis:	1996	1995
Ferða- og útiliggipeningur	1.370	1.586
Smáanboð undir 30 tkr. (1995: 10 tkr.)	2.509	783
Skrivstovuvalutir	539	503
Postgjald	517	428
Flutningur	281	457
Konsulenthjálp	781	737
Skeiðvirksemi	564	1.123
Missur av áognarum	901	1.728
Annað	2.281	1.725
	9.743	9.070

Nota 4 **Starvsfólkakostnaður**

	1996	1995
Lønir	43.338	39.248
Eftirlønir	1.474	1.194
Eftirlønargjøld	1.065	427
Annar starvsfólkakostnaður	2.062	1.400
	47.939	42.269

Í starvsfólkakostnaðinum er frokað løn og samsýning til níverandi og fráfarnu stjórnina 1.349 tkr. (1995 = 1.261 tkr.)

Annar starvsfólkakostnaður fevnir um gjald til arbeiðsmarknaðareftirlønargrunnin, trygdargrunnin, arbeiðsloysistryggingina og barnsburðargrunn.

Stovnurin hevur í roknskaparárinum í miðal havt 182 starvsfólk (í 1995 var hetta talið 177 starvsfólk)

Nota 5 **Materiell støðisogn**

	Bygningar og grundøkt	**Kaðalnr, støðir og radiotrans.**	**Innhúgv, akfør, EDV og annað**	**Arbeiðið í gerð**
Útveganarvirði 1. jan. 1996	71.070	508.416	27.819	3.804
Frágongd í árinum			(978)	(3.615)
Tilgongd í árinum	269	6.293	5.557	2.987
Niðurskriving		123.368		
Útveganarvirði 31. des. 1996	71.339	638.077	32.398	3.176
Avskrivingar 1. jan. 1996	(19.288)	(374.392)	(19.733)	
Avskrivingar í árinum	(1.424)	(32.388)	(3.791)	
Avskrivað selt			778	
Niðurskriving		(123.368)		
Avskrivingar 31. des. 1996	(20.712)	(530.148)	(22.746)	

Roknskaparligt virði				
31. des. 1996	50.627	107.929	9.652	3.176
Verður avskrivað yvir	50 ár / Years	10-15 ár/ Years	4-5 ár Years	

Keyp av minni ognarlutum, har útveganarvirðið er minni enn 30 tkr. fyri hvønn lutin, er ónreiðslufört undir øðrum kostnaði við alt 2.434 tkr.

Niðurskriving uppá 123.368 tkr. stavar frá, at kaðalanlegg nú eru skrásett í einum ognarvirðiti. Tann framda javningin hevur onga ávirkan á avskrivingargrundarlagið.

Nota 6 Fíggjarlig støðisogn

	Peningsíløgur í atknýtt virki	Onnur virðisbrøv
Útveganarvirði 1. januar 1996	5.000	99
Útveganarvirði 31. desember 1996	5.000	99
Niðurskriving 1. januar 1996	(5.000)	0
Niðurskriving 31. desember 1996	(5.000)	0
Roknskaparligt virði 31. desember 1996	0	99

Nota 7 Áogn

Øll áogn fellur til gjaldingar innan 1 ár. Avsettar undir einum eru 6.500 tkr. ímóti tapi upp á áogn av sølu.

Nota 8 Langfreistað skuld

Avdráttir av langfreistaðari skuld, sum falla til gjaldingar komandi ár, eru uppgjørdir til 41.336 tkr. Hesir eru fluttir til stuttfreistaða skuld.

Av samlaðu skuldini falla 25.774 tkr. til gjaldingar aftan á meira enn 5 ár, tvs. eftir 1. januar 2002.

Nota 9 Møgulligar skyldur

Verkið hevur í avtalu bundið seg við L.M Eriesson til at gera nýílegur og viðlíkahalda verandi skipanir við einari tíðarskjúting í mesta lagi 1 ár í senn til Danmark. Avtalan ber í sær, at verkið fær størri prísavsláttur, tá ið keypt verður frá L.M.Eriesson. Hesini skal ein ávís upphædd nýtast á hvørjum ári. Avtalan er galdandi til 1999.

Telefonverkið hevur í 1993, 1994, 1995 og 1996 seh telekort til ávikavist 737 tkr., 1.410 tkr., 1.994 tkr. og 2.413 tkr. Hesi eru ikki øll nýtt, men inntøkan er øll við í rakstrarroknskapinum.

Kortini kunnu nýtast í 3 ár, restvirðið kann eftir hetta fáast aftur frá verkinum í einum 6 mánaða tíðarskeiði.

Eftirlønir til fráfarin starvsfólk eru umr. 1.500 tkr. komandi árini.

Aðrar møguligar skyldur eru umleið tvær miltiónir krón

Skjal 3

Telefonverk Føroya Løgtings
Tinghúsvegur
100 Tórshavn

Roknskapur fyri tíðarskeiðið 1. januar til 30. juni 1997

Roknskaparfrágreiðing og átekning leiðslunnar

Hálvársroknskapurin fyri fyrra hálvár 1997 er nú liðugur, og vit kunnu staðfesta, at framgongdin frá 1996 heldur áfram.

Fyrra hálvár 1997 vaks nettosølan við 9%, úr 67.500 tkr. til 73.900 tkr. samanborið við fyrra hálvár 1996. Størsti vøksturin var í virkisøkunum fastnetstelefoni, vørusølu, arbeiði fyri fremmanda rokning og internet. Talvan niðanfyri vísir nettosøluna fyri virkisøkini fyrra hálvár 1997 samanborið við fyrra hálvár 1996.

Nettosøla	**1.hálvár 1996**	**1. hálvár 1997**	**Munur í %**
Fastnet	47.836.594	52.072.334	8,85
Farteleføni	8.258.924	7.952.138	(3,71)
Leiga linjur, vekslarar o.a.	4.539.762	4.574.708	0,77
Vørusøla	2.378.821	4.038.623	69,77
Faroe Pack	540.542	605.029	11,93
Internet	90.458	531.259	480,88
Arbeiði fyri fremmanda rokning	1.684.121	2.545.420	51,14
Ymiskt	2.149.906	1.577.487	(26,63)
Nettosøla alt	67.480.128	73.897.000	9,51

Roknskaparliga úrslitið fyrra hálvár 1997 gjørdist 13.300 tkr. ímóti 9.700 tkr. fyrra hálvár 1996.

Sum heild vaks virksemið nógv. Stórt arbeiði hevur verið í sambandi við at fyrireika eina framskundaða digitaliserting av fjarskiftiskervinum, í at nútíðargera støðisútgerðina og við at fyrireika eitt stórri útboð av framkomnum tænastum. Samlaðu fløgurnar fyrstu 6 mánaðarnar í ár vóru 14.600 tkr. ímóti 7.100 tkr. fyrstu 6 mánaðarnar.

Talið av viðskiftafólkum vaks fyrru helvt av 1997. Størsti vøksturin hevur verið innan internet tænastuna. Talið av farteleføninýtarum er økt við 25% leiðis tíðarskeiðið, og vóru 4.082 nýtarar tann 1. juli 1997. Tó eru inntøkurnar av farteleførum ikki øktar, orsaka av takstlækkingunum, sum vóru framdar í farteleførøkinum í vár.

Eginpeningurin fyrstu 6 mánaðarnar í ár hækkaði við 13.300 tkr. og var 84.100 tkr. tann 1. juli 1997. Telefonverkið hevur hetta árið avdrigið 21.200 tkr. av lániskuldini, og samlaða lániskuldin tann 1. juli 1997 var 113.600 tkr.

Gongdin higartil í ár hevur verið betri enn væntað, og Telefonverkið metir, at samlaða nettosølan í 1997 verður umleið 155.000 tkr. og at ársúrslitið verður omanfyri 25.000 tkr..

Stjórnin hevur viðgjørt og viðtikið roknskapin fyri tíðarskeiðið 1. januar til 30. juni 1997.

Vit meta, at tær nýttu roknskaparreglurnar eru hóskandi, soleiðis at roknskapurin gevur eina rættvísandi mynd av úrslitti, egnpeningi og fíggjarligu støðuni.

Tórshavn, hin 22. september 1997
Stjórn:
Andras Róin
stjórt

VÁTTAN GRANNSKOÐARANS
Sambært avtalu hava vit hjálpt til at seta upp roknskapin fyri tíðarskeiðið 1. januar til 30. juni 1997 fyri Telefonverk Føroya Løgtings.

Endamálið við og fremjanin av arbeiðnum
Arbeiði okkara hevur til endamáls at veita stuðul til gerð av hálvársroknskapinum í samsvari við góðan roknskaparsið.

Vit hava ikki grannskoðað hálvársroknskapin, av tí at hesin sambært lóggávuni ikki er grannskoðanarskyldugur, og av tí at eingin avtala er gjørd um grannskoðan. Arbeiði okkara er gjørt í samsvari við vanligar reglur viðvíkjandi roknskaparhjálp og er grundað á bókingar hjá virkinum og aðrar upplýsingar, sum vit annars hava móttikið.

Á hesum grundarlagi hava vit gjørt avstemmanir og útgreiningar, herundir ansað eftir, at uppsetta millumverandini við peningastovnar og veðskuld er avstemmað við uttanbýsis tillar, eins og vit í ávísan mun hava eftirkannað bókførsluna. Vit hava ikki eftirkannað hjáveruna og virðisásetingina av materiellu støðisognini og vørugoymsluni.

Niðurstøða
Við støði í framda arbeiðinum og móttiknum upplýsingum, og tá hædd verður tikin fyri, at grannskoðan ikki er farin fram, er tað okkara fatan, at hálvársroknskapurin er gjørdur í samsvari við lóggávuna og góðan roknskaparsið, eins og øll týðandi viðurskifti, sum vit í arbeiði okkara eru kunnað um, eru víst í roknskapinum.

Tórshavn, hin 22. september 1997
KPMG Pauli Ellefsen p/f

Pauli Ellefsen	Súni Schwartz Jacobsen
statsaut. revisor	statsaut. revisor

NÝTTAR ROKNSKAPARREGLUR
Hálvársroknskapurin fyri 1997 fyri Telefonverk Føroya Løgtings er gjørdur eftir somu roknskaparreglum sum undanfarna ár.

Roknskapurin er tillagaður uppsetingunum í nýggju ársroknskaparlógini fyri partafeløg v.m.; talva C fyri rakstur og talva A fyri fíggjarstøðu ert nýttar sum grundarlag. Hetta hóast ÁRL ikki er galdandi fyri stovnin.

Rakstrarroknskapurin
Inntøkur og kostnaðir verða í størst møguligan mun tíðargreinað til bert at fevna um fyrsta hálvár 1997. Hetta merkir, at skyldugur kostnaður verður avsettur sum skuld, og at kostnaður goldin frammanundan verður upplýstur sum ogn.

Nettosøla
Inntøkur frá sølu av vørum og tænastum verða tiknar við í rakstrarroknskapin, um fakturering er farin fram. Sjálvvaldar samtalur verða avlisnar og skrásettar kvartálliga aftaná og í hesum sambandi inntøkuførdar.

Arbeiði fyri egna rokning upptikin sum støðisogn
Arbeiði fyri egna rokning upptikin sum støðisogn fevna bæði um lidnar og ikki lidnar íløgur og verða hesar upptiknar í fíggjarstøðuni til løn, tilfar og annan kostnað.

Útreiðslur til rávøru og hjálpitilfar
Útreiðslur til rávøru og hjálpitilfar fevnir um tilfarsnýtslu til vørusølu og annan rakstur. Harumframt fevnir upphæddin eisini um tilfar v.m., ið verður nýtt til íløgur, ið verða inntøkuførdar undir upphæddini "arbeiði fyri egna rokning upptikin sum støðisogn"

Kostnaður av støðisogn
Kostnaður av støðisogn fevnir um allan kostnað, herundir leigu, el og lúta av teimum bygningum, maskinum og akførum v.m., sum verkið nýtir.

Annar rakstrarkostnaður
Rakstrarkostnaður fevnir um allan annan rakstrarkostnað.

Konsessiónsgjald
Konsessiónsgjald er tað av landsstýrinum ásetta gjaldið til landskassan.

Óvanligar inntøkur og útreiðslur
Óvanligar inntøkur og útreiðslur fevna um upphæddir, ið eru óvanligar og ikki afturvendandi, og sum ikki hava nakað við vanliga raksturin at gera.

Materiell støðisogn
Materiell støðisogn verður virðisset til útveganar-/kostprís við frádrátti av samlaðum gjørdum roknskaparligum av- og niðurskrivingum. Útveganar-/ kostprísurin er íroknaður møguligar rentur og aðrar útreiðslur av íløgumi, til hon verður tikin í nýtslu.

Avskrivingin er eins stór fyrt tey einstøku roknskaparárini og er sett út frá mettu brúkstíðini fyri materiellu støðisognina.

Tey nýttu avskrivingartíðarskeiðini eru:

Bygningar og grundøki	50 ár
Kaðalar	15 ár
Støðir	10 ár
Radiostøðir	10 ár
Innbúgv og akfør	5 ár
Eldv-tól	4 ár

Støðisogn í gerð verður ikki avskrivað.

Útveganir, sum hvør sær kosta minnt enn 30.000 kr., verða útreiðsluførdar í útveganarárinum undir øðrum kostnaði.

Fíggjarlig støðisogn
Fíggjarlig støðisogn verður upptikin til útveganarvirði.

Vørugoymslur
Vørugoymslur og arbeiði í gerð verða upptikin til ávikavist útveganar- og kostprís.

Liðugtvørur og hjálpitilfar verða upptikin til vigaðan miðalprís, íroknað frakt og toll. Niðurskrivingar vegna aldur og aðrar orsøkir til ókurans verða gjørdar leypandi.

Arbeiði í gerð fyri fremmanda rokning verða upptikin í tíggjarstøðuni til løn, tilfar og annan kostnað.

Áogn
Áogn verður upptikin til áljóðandi virði við frádrátti av niðurskriving fróti tapi. Avsetingin verður gjørd undir einum.

Fremmant gjaldoyra
Áogn og skuld í fremmandum gjaldoyra verða umroknað til føroyskar krónur út frá kursinum tíggjarstøðudagin.

Valutakurstap og -vinningar verða tikin við í rakstrarroknskapin.

Skattir
Telefonverkið er ikki skattskyldugt.

---***---

Í tahuppsetingunum verða nýttar klombrur uttan um negativ úrslit og frádráttarupphæddir.

Allar upphæddir eru í heilum túsund krónum.

RAKSTRARROKNSKAPUR FYRI 1. JANUAR TIL 30. JUNI 1997

Nota		1. hálvár 1997 tkr.	1. hálvár 1996 tkr.
1	**Nettosøla**	73.897	67.480
	Broyting, arbeiði í gerð fyri fremmanda rokning	869	630
	Arbeiði fyri egna rokning upptikin sum støðisogn	13.716	4.163
	Aðrar rakstrarinntøkur	4.627	2.688
	Framleiðsluvirði	93.110	74.961
	Útreiðslur til rávøru og hjálpartilfar	(14.762)	(7.566)2
	Kostnaður av støðisogn	(8.564)	(6.963)3
	Annar rakstrarkostnaður	(5.863)	(4.442)
	Bruttoúrslit	63.920	55.9904
	Starvsfólkakostnaður	(25.015)	(23.272)
	Úrslit áðrenn avskrivingar	38.905	32.7185
	Avskrivingar av materiellari støðisogn	(19.384)	(17.118)
	Úrslit áðrenn rentur o.a.	19.521	15.600
	Rentuinntøkur og tílíkar inntøkur	391	355
	Rentukostnaður og tílíkar útreiðslur	(5.182)	(6.215)
	Úrslit áðrenn konsessiónsgjald	14.730	9.740
	Konsessiónsgjald v.m.	(1.350)	-
	Hálvársúrslitið	13.380	9.740

FÍGGJARSTØÐA TANN 30. JUNI 1997

Nota		30/06 1997	30/06 1996
	OGN		
	Støðisogn		
5	**Materiell støðisogn**		
	Bygningar og grundøki	63.322	51.071
	Kaðalar, støðir og radio	91.369	121.185
	Innbúgv. akfør, edv og onnur rakstrartól	8.979	9.544
	Støðisogn í gerð	16.490	5.947
		180.160	187.747
6	**Fíggjarlig støðisogn**		
	Peningaíløgur í atknýtt virki	0	0
	Onnur virðisbrøv	99	99
		99	99
	Støðisogn í alt	180.259	187.846
	Ogn í umferð		
	Vørugoymslur		
	Liðugtvøra og hjálpartilfar	15.160	12.899
	Arbeiði í gerð fyri fremmanda rokning	1.069	2.763
		16.229	15.662
7	**Áogn**		
	Áogn av sølu	17.627	11.808
	Áogn, atknýtt virki	0	6.721
	Tíðargreiningar	1.120	1.662
		18.747	20.192
8	**Tøkur peningur**	19.088	17.739
	Ogn í umferð í alt	54.064	53.593
	OGN Í ALT	234.323	241.440

Nota		30/06 1997	30/06 1996
	EGINPENINGUR OG SKULD		
	Eginpeningur		
	Eginpeningur við ársbyrjan	70.760	52.822
	Úrslit frá rakstri	13.380	9.740
	Eginpeningur 30. juni	**84.140**	**62.562**
	Skuld		
9	**Langfreistað skuld**		
	Útlendskir lánistovnar	48.363	80.008
	Íleggingargrunnurin fyri Føroyar	26.667	29.444
		75.030	109.452
	Stuttfreistað skuld		
	Avdráttir av langfreistaðari skuld, sum falla til gjaldingar komandi ár	38.618	32.403
	Skuld til peningastovnar	468	2.124
	Goldið frammanundan frá telefonfelagum	5.210	4.570

	Vøru- og tænastuskuld	16.434	14.092
10	Onnur skuld	14.424	16.237
		75.153	69.426
	Skuld í alt	**150.183**	**178.878**
	EGINPENINGUR OG SKULD Í ALT	**234.323**	**241.440**

11 **Møguligar skyldur**

PENINGASTREYMSYVIRLIT

tkr.		Jan-Juni 1997	Jan-Juni 1996
	Peningastreymur frá rakstri		
	Inntøkur í alt	93.110	74.961
	Kostnaðir í alt	(55.555)	(42.243)
	Peningastreymur frá rakstri áðrenn broyting í stuttfreistaðari ogn og skuld	37.555	32.718
	*)Broyting í vørugoymslum	(2.804)	(2.095)
	*)Broyting í ágoldnum og goldið frammanundan frá telefonfelagum	1.764	8.716
	*)Broyting í vøru- og tænastuskuld og aðrari skuld	(134)	(1.308)
	Peningastreymur frá vanligum rakstri	36.382	38.030
	Rentur í rakstri, netto	(4.791)	(5.860)
	Peningastreymur frá rakstri	31.591	32.170
	Íløgur í materiella støðisogn	(14.617)	(7.171)
	Peningastreymur nýttur til íløgur	(14.617)	(7.171)
	Avdráttir av lánum	(21.247)	(14.439)
	Banka- og sparikassaskuld	(1.884)	(1.640)
	Peningastreymur frá fígging	(23.131)	(16.079)
	Ársins peningastreymur frá rakstri, íløgum og fígging	(6.159)	8.920
	Tøkur peningur 1. januar	25.246	8.819
	Tøkur peningur 30. juni	19.088	17.739

Verkið hevur eitt loyvt maksimum upp á 10.000 tkr. í peningastovnum. Av hesum eru 468 tkr. nýttar pr. 30. juni 1997.

*Broyting í mun til uppgerðir 31. desember 1996.

NOTUR TIL HÁLVÁRSROKNSKAPIN

1 **Nettosøla**

Nettosølan kann sundurgreinast soleiðis:	1. hálvár 1997	1 hálvár 1996
Sjálvvaldar samtalur	46.337	44.238
Felagagjøld	12.526	11.552
Stovningargjøld	1.278	797
Innleggingar	936	828

	Sergjøld	427	386
	Leiga av linjum, vekslarum v.m.	3.158	3.202
	Vøru- og kortsøla	4.039	2.649
	Telefonistavgreiddar samtalur	1.158	1.038
	Fjarrit	370	400
	Arbeiði fyri fremmanda rokning	2.545	1.684
	Ymsar inntøkur	1.123	705
		73.897	67.480
2	**Kostnaður av støðisogn**		
	Ravmagn og hiti	2.688	2.543
	Leigukostnaður	472	1.460
	Tryggingar	305	324
	Bilrakstur	456	330
	Ymsar entreprenørveitingar og umvælingar	3.359	1.585
	Tænastuavtalur og konsulentar	1.217	658
	Annað	67	63
		8.564	6.963
3	**Annar kostnaður**	1. hálvár 1997	1 hálvár 1996
	Ferða- og útiliggipeningur	744	706
	Umboðan	44	54
	Tíðarrit	86	85
	Smáanboð undir 30.000 kr.	1.458	1.046
	Skrivstovuvalutir	329	234
	Postgjald	408	268
	Flutningur	504	135
	Taxa og bilpeningur	44	58
	Konsulenthjálp herundir grannskoðan og advokat	1.159	124
	Skeiðvirksemi	416	261
	Tap av skuldarum	43	749
	øtufremjan	201	391
	Gransking	128	0
	Annað	299	331
		5.863	4.442
4	**Starvsfólkakostnaður**		
	Lønir	22.735	20.926
	Eftirlønir	1.259	1.350
	Annar starvsfólkakostnaður	1.022	996
		25.015	23.272

Materiel støðisogn

	Bygningar og grundøki	Kaðalar, støðir og radiotól	Innbúgv, akfør eslv	Støðisogn í gerð
Útveganarvirði 1. januar 1997	71.339	638.077	32.398	3.176
Tilgongd/frágongd í árinum, netto	13.544	0	923	13.314
Útveganarvirði 30. juni 1997	84.883	638.077	33.321	16.355
Av- og niðurskriv-ingar 1/1- 1997	(20.712)	(530.148)	(22.746)	-
Avskrivingar av frágongd	0	(23)	403	-
Avskrivingar í árinum	(849)	(16.537)	(1.999)	-
Avskrivingar 30. juni 1997	(21.561)	(546.708)	(24.342)	-
Roknskaparligt virði 30. juni 1997	63.322	91.369	8.979	16.355
Verður avskrivað yvir	50 ár	10-15 ár	4-5 ár	

Keyp av smærri ognarlutum, har útveganarpeningurin er minni enn 30.000 kr. fyri hvønn lutin, eru útreiðsluførd í rakstrinum undir øðrum kostnaði við í alt 1.458 tkr.

6 **Figgjarlig støðisogn**

	Peningaflogur í atknýtt virki	Onnur virðisbrøv
Útveganarpeningur 1. januar 1997	5.000	99
Útveganarpeningur 30. juni 1997	0	99
Javningar 1. januar 1997	(5.000)	(0)
Javningar 30. juni 1997	(0)	(0)
Roknskaparligt virði 30. juni 1997	0	99

Peningaflogur í atknýtt virki fevndu um 100% av partapeninginum í P/F Matr.nr. 1381 Ø/e. Tórshavn. Felagið er avtikið og bygningurin, ið felagið átti, er yvirtikin av Telefonverkinum.

7 **Áogn**

Øll áogn av sølu fellur til gjaldingar innan 1 ár. Avsettar eru undir einum 6.500 tkr. ímóti tapi uppá áogn av sølu.

8 **Tøkur peningur**

Av tøka peninginum standa 1.431 tkr. á konto har peningurin fer beinleiðis til avdráttir av láni.

9 **Langfreistað skuld**

	tkr.
Avdráttir komandi árið	38.618
Avdráttir 1-5 ár fram	53.620
Avdráttir eftir 5 ár	21.410
	113.648

Við í skuldini er lán yvirtikið í hálvárinum uppá 5.908 tkr.,

Avdráttir av langfreistari skuld, sum falla til gjaldingar komandi ár, eru fluttir til stuttfreistaða skuld.

10 **Onnur skuld**

	1. hálvár 1997	1 hálvár 1996
Meirvirðisgjald	8.411	9.645
Skyldug renta, lán	1.821	3.046
Skyldug fríðarløn, fastløn	2.861	2.872
Skyldug løn	1.043	532
Skyldug arbeiðsmarknaðargjøld	288	141
	14.424	16.237

11 **Møguligar skyldur**

Verkið hevur í avtalu við L.M. Ericsson bundið seg til at gera nýíløgur og viðlíkahalda verandi skipanir við einari forskjøting uppá í mesta lagi 1 ár frá tí sum verður gjørt í Danmark. Hetta førir við sær, at verkið fær størri prísavsláttur tá tað keypt verður frá L.M. Ericsson. Eisini skal ein ávís upphædd nýtast á hvørjum ári. Avtalan er galdandi fram til 1999.

Verkið hevur í 1993, 1994, 1995, 1996 og fyrra hálvár 1997 selt telekort fyri ávíkavist 737 tkr., 1.440 tkr., 1.914 tkr., 2.413 tkr og 840 tkr. Hesi eru ikki øll brúkt, men øll innløkan er tikin við í rakstrarroknskapinum. Kortini kunnu nýtast í 3 ár, og restvirðið kann eftir hetta fáast aftur frá verkinum, tó einum 6 mánaðar tíðarskeiði.

Verkið hevur gjørt leigusáttmálar við árligum gjøldum upp á umleið 1.200 tkr.

Eftirløunargjøld til fráfarin starvsfólk eru umleið 1.500 tkr. um árið.

Tolf- og Skattstovan hevur ikki góðskrivað umleið 1.300 tkr. av avgreiddum mvg-kravi móti TFL. Hetta er partur av máli sum snúði seg um mvg av samarbeiði við Tele Danmark.

Fylgiskjal 4: Mettur hálvársroknskapur 1997/2

	1.hálvár 97	**2.hálvár 97**	**1997**
Fastnet	52,1	54,4	106,5
Fartelefoni	8,0	11,0	19,0
Leiga linjur, vekslarar o.a.	4,6	2,4	7,0
Vørusøla	4,0	5,0	9,0
Faroe Pack	0,6	0,9	1,5
Internet	0,5	1,1	1,6
Arbeiði fyri fremmanda rokning	2,5	4,5	7,0
Ymiskt	1,6	2,8	4,4
Nettosøla ialt	**73,9**	**82,1**	**156,0**
Broyting, arbeiði í gerð fyri fremmanda rokning	0,9	0,0	0,9
Arbeiði fyri egna rokning upptikið sum støðisogn	13,7	18,0	31,7
Aðrar rakstrarinntøkur	4,6	5,0	9,6
Framleiðsluvirði	**93,1**	**105,1**	**198,2**
Útreiðslur til rávøru og hjálpitilfar	14,8	17,2	32,0
Kostnaður av støðisogn	8,5	14,5	23,0
Annar rakstrarkostnaður	5,9	6,1	12,0
Bruttoúrslit	**63,9**	**67,3**	**131,2**
tarvsfólkakostnaður	25,0	26,0	51,0
Úrslit áðrenn uvskrivingar	**38,9**	**41,3**	**80,2**
Avskrivingar av materiellari støðisogn	19,4	19,6	39,0

Úrslit áðrenn rentur o.a.	**19,5**	**21,7**	**41,2**
Rentuinntøkur og tílíkar inntøkur	0,4	0,6	1,0
Rentukostnaður og tílíkar útreiðslur	5,2	4,8	10,0
Úrslit áðrenn konsessiónsgjald	**14,7**	**17,5**	**32,2**
Konsessiónsgjald við meira	1,3	0,7	2,0
Úrslit	**13,4**	**16,8**	**30,2**

Fylgiskjal 4: Mettur hálvársroknskapur 1997/2.
Meting Telefonverk Føroya Løgtings av rakstrarúrslitinum frá 1. juli 1997 til 31.desember 1997 tann 17. oktober 1997.

Fylgiskjal 5: Høvuðstøl úr fíggjarætlan Telefonverksins 1997 - 2002.
Telefonverk Føroya Løgtings hevur sett upp "Høvuðstøl úr fíggjarætlan Telefonverksins 1997 til 2002" tann 17. oktober 1997.

Fjarskiftisøkið hevur framburð hesi árini, og sæst hetta eisini aftur í roknskapum og fíggjarætlanunum hjá Telefonverkinum. Nettosølan øktist frá 1995 til 1996 við 12,3 %, einahelst orsakað av yvirtøkuavtalunum um uttanlandssamskiftið, sum tó eisini høvdu øktar fløgur og rakstrarútreiðslur við sær fyri Telefonverkið. Telefonverkið væntar framhaldandi vøkstur í nettosølumi og í úrslitinum. Ein høvuðsfortreyt fyri vøkstrinum er, at fløgur verða gjørdar, í at gera digitalisering lidna og útbygging av kervinum, í nýmótansgerð av støðisíthúnaði og av EDV skipanum. Í fíggjarætlanini er lagt upp til, at Telefonverkið ger fløgur fyri 35 mió. kr. um árið fíggjað yvir raksturin, og at lán verða tikin primo 1998 uppá 50 mió. kr. til keyp av kapasiteti í Cantat-3 kaðalinum og 15 mió. kr. til at seta í gongd eina nýggja fartelefonskipan.

Samlaða lániskuldin hjá Telefonverkinum er minkað úr umr. 350 mió. kr. í 1990, niður í 129 mió. kr. primo 1997. Samlaða lániskuldin primo 2002 er, við lántøkunum í 1998, mett at verða 64,4 mió. kr.

Fíggjarætlanin er løgd út frá teimum fortreytum, sum Telefonverkið kennir í dag, men menningin á fjarskiftisøkinum er ógvuslig, og kunnu fortreytirnar broytast skjótt.

Fylgiskjal 5: Høvuðstøl úr fíggjarætlan Telefonverksins 1997 til 2002

	1996	1997	1998	1999	2000	2001	2002
Nettosøla	147.40	156.00	172.90	180.40	195.50	207.10	217.60
Framleiðsluvirði	160.50	198.20	215.90	221.40	234.50	246.10	256.60
Kostnaður í alt	45.40	67.00	75.00	81.00	87.00	93.00	99.00
Bruttovinningur	**115.10**	**131.20**	**140.90**	**140.40**	**147.50**	**153.10**	**157.60**
Starvsfólkakostnaður	47.90	51.00	55.00	60.00	61.00	62.00	63.00
Úrslit áðren avskrivingar	**67.10**	**80.20**	**85.90**	**80.40**	**86.50**	**91.10**	**94.60**
Avskrivingar	37.80	39.00	39.00	39.00	39.00	39.00	39.00
Úrslit áðrenn rentur o.a.	**29.30**	**41.20**	**46.90**	**41.40**	**47.50**	**52.10**	**55.60**
Rentuinntøkur	0.60	1.00	1.00	1.00	1.00	1.00	1.00
Rentuútreiðslur	12.00	10.00	10.80	8.90	7.50	6.00	4.50
Úrslit áðrenn konsessiónsgjald	**17.90**	**32.20**	**37.10**	**33.50**	**41.00**	**47.10**	**52.10**
konsessiónsgjald	0.00	2.00	2.00	2.00	2.00	2.00	2.00
Úrslit áðrenn skatt	**17.90**	**30.20**	**35.10**	**31.50**	**39.00**	**45.10**	**50.10**
skattur av ársúrslitt	0.00	0.00	9.48	8.51	10.53	12.18	13.53
Úrslit eftir skatt	**17.90**	**30.20**	**25.62**	**23.00**	**28.47**	**32.92**	**36.57**

Lániskuld (primo):							
langfreista	130.50	87.70	124.10	104.20	84.30	64.40	46.00
stuttfreista	25.80	41.30	34.40	19.90	19.90	19.90	18.40
Ialt	**156.30**	**129.00**	**158.50**	**124.10**	**104.20**	**84.30**	**64.40**

1. viðgerð 10. desember 1997. Uppskotið varð beint í mentanarnevndina, sum hósdagin tann 12. mars 1998 legði fram soljóðandi:

Álit

Málið er lagt fram av landsstýrinum tann 25. november 1997 og eftir 1. viðgerð tann 10. desember 1997 beint í mentanarnevndina.

Nevndin hevur viðgjørt málið á fundum 19. januar 1998, 29. januar 1998, 6. februar 1998, 10. februar 1998, 13. februar 1998, 24. februar 1998 og 6. mars 1998.

Nevndin hevur undir viðgerðini havt fund við landsstýrismannin og við umboð fyri Telefonverk Føroya Løgtings.

Frá Telefonverki Føroya Løgtings hevur nevndin fingið eina frágreiðing um ognir hjá stovninum. Frágreiðingin er viðløgd álitinum, fyri at løgtingið skal fáa eina mynd av, hvat fyri ognir talan er um í § 2 í lógaruppskotinum.

Í sambandi við fyrstu viðgerð av lógaruppskotinum varð spurningur settur við, hvør skuldi hava ognarrættin til grundøkið, matr. nr. 421, Tórshavn.

Formansskapurin í løgtinginum hevur viðgjørt spurningin og ynskir at tryggja løgtinginum ognarrættin til grundøkið og bygningarnar, ið standa á grundøkinum, matr. nr. 421, Tórshavn. Hesum kann nevndin taka undir við, men metir, at Telefonverkið tó framhaldandi skal kunna nýta telefonverksbygningin til virksemi sítt, til onnur avtala er gjørd.

Nevndin metir, tað harumframt vera umráðandi at tryggja, at virksemið hjá Telefonverki Føroya Løgtings ikki verður niðurlagt, og ognirnar avhendar, uttan at støða verður tikin til spurningin um, hvør skal hava tær veitingarskyldur, Telefonverk Føroya Løgtings higartil hevur rækt.

Fyri av avmarka fíggjarligu avleiðingarnar av uppskotinum til eina ávísa upphædd, verður skotið upp, at landsstýrið í mesta lagi skal kunna seta 200 mió. kr. í P/f Telefonverkið.

Vísandi til ásetingarnar í § 2 í lógaruppskotinum um ogn, skuld, rættindi og skuldbindingar hjá Telefonverki Føroya Løgtings heldur nevndin, tað vera umráðandi at vísa á, at viðvíkjandi kollektivum sáttmálunum um løn og starvsviðurskifti hjá starvsfólkinum, so átekar P/f Telefonverkið sær tær skyldur og yvirtekur tey rættindi, sum landsstýrið hevur havt.

Nevndin er annars undir viðgerðini komin eftir, at lógaruppskotið á ávísum økjum má broytast orsakað av ásetingum í stýrisskipanarlógini og grundlógini. Vist verður í hesum sambandi til viðmerkingarnar til tær einstøku greinarnar.

Ein samd mentanarnevnd mælir við hesum viðmerkingum løgtinginum til at samtykkja uppskot landsstýrisins við niðanfyristandandi

broytingaruppskoti
til
uppskot landsstýrisins

1) § 2 verður orðað soleiðis: "Landsstýrismanninum er heimilað at stovna partafelag, P/f Telefonverkið, við gildi frá 1. januar 1998, og at gera avtalur um at leggja felagnum til alla ogn og skuld, rættindi og skuldbindingar hjá Telefonverki Føroya Løgtings. Løgtingsognin, matr. nr. 421, Tórshavn er ikki partur av ognunum, ið nevndar eru í 1. pkt.
Stk. 2. Landsstýrið fær heimild til at steðga virkseminum hjá Telefonverki Føroya Løgtings, samstundis sum ognir verða avhendar smb. stk. 1, og P/f Telefonverkið yvirtekur hesar uppgávur smb. konsessión givnari smb. fjarskiftislógini."

2) Í § 3, stk. 2, verður sett inn nýtt pkt. 2, ið verður soljóðandi: "Landsstýrið kann tó í mesta lagi seta 200 mió. kr. í P/f Telefonverkið."

3) Í § 3, stk. 3, verða orðini "uttan løgtingið gevur samtykki til tess" broytt til "uttan við heimild í løgtingslóg".

4) § 6 verður orðað soleiðis: "Løgtingslógin fær gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd. Stk. 2. Samstundis fer úr gildi lóg nr. 110 frá 30.05.1927 "om styrelsen af Post- og Telegrafvæsenet", sum broytt við løgtingslóg nr. 17 frá 31.03.1976."

Viðmerkingar:

Viðv. 1) Skuld og skuldbindingar hjá landinum innibera ávís rættindi fyri tey, ið hendan skuld og hesar skuldbindingar eru mótvegis. Skulu skuld og skuldbindingar hjá landinum falla burtur ella broytast, kann hetta tí bert henda antin við avtalu við rættindahavaran, ella við ognartøku og móti fullum endurgjaldi til rættindahavaran. Løgtingið kann ikki við lóg geva landsstýrinum heimild til at flyta skuld og skuldbindingar hjá tí almenna til eitt partafelag. § 2, stk. 1 er tí broytt soleiðis, at landsstýrið fær heimild at gera avtalur um at leggja m.a. skuld og skuldbindingar til P/f Telefonverkið.

Viðmerkt er eisini, at løgtingsognin, matr. nr. 421, Tórshavn, verður ikki mett at vera partur av fjarskiftisognum landsins. Hetta skal skiljast soleiðis, at løgtingið vinnur at tryggja sær ognarrættin til grundøkið og bygningarnar, ið standa á grundøkinum. Telefonverkið skal tó framhaldandi kunna nýta telefonverksbygningin til virksemi sítt.

Í § 2, stk. 2, fær landsstýrið heimild til at steðga virkseminum hjá Telefonverkinum. Hendan heimild er treytað av, at tað almenna partafelagið, P/f Telefonverkið, samstundis yvirtekur hesar uppgávur smb. konsessión givnari smb. fjarskiftislógini. Eisini er heimildin treytað av, at fjarskiftisognir landsins samstundis verða avhendar til P/f Telefonverkið. Hetta er fyri at tryggja, at ognarrætturin til fjarskiftiskervið er samantengdur við konsessiónini. Landsstýrið vil so, fyri at tryggja sær eina nøktandi samráðingarstøðu mótvegis P/f Telefonverkinum, avhendu fjarskiftisognir landsins við fyrivarni um, at landið kann keypa ognirnar aftur, um konsessiónin fellur heilt ella partvíst burtur. Annars hevur spurningurin um veitingarskyldur hjá P/f Telefonverkinum einki við hesa lóg at gera, men má loysast av landsstýrinum smb. § 8 í fjarskiftislógini. Ásetingin er ikki til hindurs fyri, at uppgávur, sum í dag verða røktar av Telefonverki Føroya Løgtings, sambært fjarskiftislógini kunnu verða undantiknar frá einkarrætti landsins ella seinni veittar í konsessión til onnur enn P/f Telefonverkið.

Viðv. 2) Í § 3, stk. 2, verður heimildin, ið givin er landsstýrinum í § 3, stk. 1, avmarkað soleiðis, at landsstýrið í mesta lagi kann seta 200 mió. kr. í P/f Telefonverkið. Neyðugt er tó harumframt - sum altíð - við játtan á fíggjarlógini í sambandi við, at landið skal avhalda útreiðslur. Hetta er galdandi, bæði um landsstýrið gev av at seta reiðan pening í partafelagið, og um landstýrið gev av at gera apportinnskot (onnur virði enn reiðan pening) í partafelagið. Víst verður í hesum sambandi til grundlógina § 46, stk. 2, og til stýrisskipanarlógina § 43, stk. 2. Búskapardeildin í landsstýrinum hevur upplýst, at ætlanin er, at upphæddin verður sett á eykajáttannarlóg fyri fíggjarárið 1998. Til samanberingar kann eisini viðmerkjast, at tá Tele Sønderjylland og Statens Teletjeneste vórðu umskipað til partafeløg, varð peningur settur av á donsku fíggjarlógini

til "køb af værdipapirer". Hesini vórðu inntøkurnar, ið fingnar vórðu við sølu av "anlægsaktiver" til Tele Sønderjylland, skrásettar á fíggjarlógini.

Viðv. 3) Samsvarandi stýrisskipanarlógini § 1 ber ikki til at áseta í eini lóg, at ítøkiligar avgerðir eftir lógini verða liknar av landsstýrinum, og treyta heimildina av, at avgerðir verða góðkendar við løgtingssamtykt, áðrenn tær fáa gildi. § 3, stk. 3, er tí brotin soleiðis, at partabrøvini ikki kunnu avhendast uttan við heimild í løgtingslóg.

Viðv. 4) Løgtingslógin fær gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd, og landsstýrið ger sostatt sjálvt av, nær tað vil nýta tær heimildir, ið lógin gevur. Lóg nr. 110 frá 30. mai 1927 fer samstundis úr gildi. Mett verður ikki, at hendan lógin hevur nakað innihald longur.

Av øðrum reglum, ið galdandi eru á økinum, kunnu nevnast, reglugerð fyri Telefonverk Føroya Løgtings, sum lýst í kunngerð nr. 10 frá 18. februar 1987, kunngerðir givnar við heimild í løgtingslóg nr. 28 frá 22. mai 1969 um áseting av telefongjøldum, og anordning nr. 156 af 07.04.1924 om telegrambesørgelse gennem telefon. Hesar reglur kann landsstýrið seta úr gildi uttan heimild í serligari løgtingslóg.

Fylgiskjal til álit

Viðvíkjandi fundi við Mentanarnevndina t. 10. februar 1998

Løgtingsmál nr. 32/1997

Uppskot til løgtingslóg um umlegging av Telefonverki Føroya Løgtings til partafelag

Samsvarandi § 2 í lógaruppskotinum verður til P/F Telefonverið lagt øll ogn og skuld, rættindi og skuldbindingar hjá hjá Telefonverki Føroya Løgtings.

Í sambandi við viðgerðina í Mentanarnevndini t. 10 februar var ynskt fram um, at Telefonverkið útvegaði eitt yvirlit yvir, hvørjar ognir talan er um.

Framvegis í vónini um skjóta viðgerð, verður omanfyri nevnda yvirlit hervið sent Mentanarnevndini v/ Løgtingsskrivstovuni.

Í yvirlitinum er denturin lagdur á at vísa eitt yvirlit yvir bygningar, mastrar og sendinet, meðan Telefonverið ikki hevur mett tað neyðugt at gera stórvegis burtur úr kaðalum, radio og støðisútgerð, eins og EDV, akfør og innbúgv ikki eru tikin við.

Yvirlit vísir fyrst í hjáriti 1. Bygningar
Her er talan um fylgjandi bygningar: FM hús, automatstøðir (centralbygningar), kaðalgreinarar, radiostøðir umframt minni bólkar. Sum sæst uttast til høgru í yvirlitinum, er fyri allar bólkar uttan ein, talan um, at Telefonverk Føroya Løgtings stendur sum eigari, og at hesir sostatt verða fluttir yvir til nýggja partafelagið. Undantikið eru FM húsini, har Føroya Landsstýri eigur 2/3 og TFL bert 1/3. Í hesum førum verður tað sostatt bert 1/3, sum verður fluttur yvir í nýggju partafelagið. Bókaðu virðið av TFL partinum er 73 mió. kr.

Hjárit 2.1 og 2.2. Mastrar
Mastrarnar eru knýttar at radiostøðum, telefonstøðum umframt eina mastur á Sandfelli og ein spegil. TFL eigur allar mastrarnar á fyrstu sýn, við fylgjandi undantøkum: Húsareyn, Hesturin Hái, Brúnaskarð, Eysturhøvda og Skattafjall. Fyri hesi 5 er galdandi, at TFL eigur 1/3, meðan Føroya Landsstýri eigur restina. Sostatt verða í hesum førunum bert hesir triðjingar fluttir yvir í partafelagið, við einum bókaðum virði upp á 9,0 mió. kr. Í hjáriti 2.2. eru listaðar mastrur við tilknýti til Útvarps- og Sjónvarps-sendinetini. Fyri hesar er

galdandi. at Føroya Landsstýri eigur tær, og at eingin broyting hendir í hesum við umskipanini av TFL til partafelag.

Hjárit 3.1, 3.2 og 3.3. Sendinet
Hjáritini 3.1 og 3.2 vísa sendiútgerðina til útvarp og sjónvarp. Fyri hesi er galdandi, at Føroya Landsstýri eigur alt og TFL einki, og í hesum hendir eingin broyting við umskipan av TFL til partafelag. SAma er galdandi fyri MB-sendaran í Akrabyrgi, hjárit 3.3.

Telefonverkið vónar, at hesar upplýsingar eru nøktandi, og at málið kann verða avgreitt.

Hevur Mentanarnevndin spurningar, er hon sjálvsagt altíð velkomin at seta seg í samband við Telefonverkið – P/F ella ikki.

2. viðgerð týsdagin 24. mars 1998. Uppskot frá Henrik Old um at beina málið aftur í nevnd fall 8-3-18. Broytingaruppskot frá mentanarnevndini til §§ 2, 3 og 6 samtykt 24-5-0. §§ 2, 3 og 6 soleiðis broyttar samtykt 24-5-0. §§ 1, 4 og 5 samtyktar 24-5-0. At uppskotið soleiðis samtykt kann fara til 3. viðgerð samtykt 24-5-0.

3. viðgerð fríggjadagin 27. mars 1998. Uppskotið, sum samtykt við 2. viðgerð, endaliga samtykt 24-5-0.

L.l. nr. 42 frá 03.04.1998
EL. j.nr. 1920-6/1997

	Bókað virði 31.12.97
Grundøki & bygningar	82.117.149
Kaðalar	49.999.925
Radio & Støðir	28.547.958
Akfør	3.204.991
Edv	6.141.263
Innbúgv	270.433
Annað	1.405.340
	171.687.060

Nr.	Slag	Stað	Adressa	Matr.nr.	Tryggg.nr.	Ognarviðurskifti	Leiga/loyvi	Gr. eiað	Bygning	Kr.	Um	Stovnur	TFL' partur	Fordeiling
	F.M. Hús	Stentarfjall 2	Mikladalur			Jarðarráði	Loyvi		12			FL/TFL	50	TFL 1/3 FL 2/3
	F.M. Hús gamla	Stentarfjall 1	Mikladalur		104728	Jarðarráði	Loyvi		2			FL/TFL	4	TFL 1/3 FL 2/3
	F.M. Stað	Eysturhavdi	Svinoy		104734	Jarðarráði	Jarðarráð		10			FL/TFL	19	TFL 1/3 FL 2/3
	FM Hús	Hesturin Hál	Vágur	325 b/325c	104737	TFL 33%	Skeyti 8.11.69	3500	68			FL/TFL	102	TFL 1/3 FL 2/3
	FM Hús	Húsareym fm	Tórshavn	1175 b	156137	Eyst.húsgarðsf.	sak koyrandi	10.000	140	100	1/ár	FL/TFL	291	TFL 1/3 FL 2/3
	FM Hús	Nes Hvalba	Hvalba	87 r	104732		Jarðar. sáttm. 24.5	50	7	100	1/ár	FL/TFL	8	TFL 1/3 FL 2/3
	FM-Hús	Saksun	Saksum		104739	Magnus Joensen	6.5.77 byg.lovið		7			FL/TFL	13	TFL 1/3 FL 2/3
	FM-Hús	Prestlangi	Miðvágur	419	104758	Jarðaráði	Loyvi		7			FL/TFL	19	TFL 1/3 FL 2/3
	FM-Hús	I Dalum	Vestmanna		104740	Nesshagi	30.7.76 byg.loyv		7			FL/TFL	7	TFL 1/3 FL 2/3
	FM-hús	Skelðin	Sandvágur		104750	Selvikarhagi	Loyvi		7			FL/TFL	13	TFL 1/3 FL 2/3
	FM. Hús	Brúnaskarð fm	Klaksvík	1655	104762	Vágshagi	Leiga	2635	66			FL/TFL	129	TFL 1/3 FL 2/3
	Antennuhús	Húsareym sat	Tórshavn	1175 G				957	32			TFL	0	TFL 1/1
	Automatstað	Kollafjarð	Kollafjørður	341	104754	Kongsf. P. av Steinu	Jarðarráði	745	123			TFL	326	TFL 1/1
	Automatstað	Nesvík	Nesvík	fyribils 149	104749	TFL Skeyti	Skeyti 5.9.78	2000	55			TFL	151	TFL 1/1
	Automatstað	Vágur	Vágur	253 b	104719	TFL 30.11.70	Skeyti 30.11.70	500	55			TFL	135	TFL 1/1
	Automatstað	Miðvágur	Miðvágur	341	104759	TFL	20.1.81 Skeyti	3473	649			TFL	2.752	TFL 1/1
	Automatstað	Vestmanna	Vestmanna	205 w	104746	TFL	skeyti 3.7.79	228	55			TFL	148	TFL 1/1
B0342	Automatstað	Rúnavík	Rúnavík	262 e	158138	TFL 30.3.73	Skeyti 30.3.73	924	188			TFL	1.486	TFL 1/1
B0343	Automatstað	Fuglafjørður	Rúnavik	143 ad	104742	TFL 11.6.75	Skeyti 11.6.75	584	55			TFL	135	TFL 1/1
B0344	Automatstað	Leirvik	Leirvik	165 a	104743	TFL 21.8.73	Skeyti 21.8.73	349	55			TFL	93	TFL 1/1
B0341	Automatstað	Seldarfjørður	Seldarfjørð	24 b	104747	TFL 28.5.72	Skeyti 28.5.72	820	129			TFL	905	TFL 1/1
	Automatstað	Eiði a	Eiði	24	104738	TFL 15.4.75	ognarbrev 15.4.7		55			TFL	151	TFL 1/1
	Automatstað	Tórshavn	Tórshavn	421	104717	Amtskommunu		1.258	462			TFL	14.285	TFL 1/1
	Automatstað	Nólsoy	Nólsoy	128 b	104752	TFL skeyti		114	48			TFL	132	TFL 1/1
	Automatstað	Tvøroyri	Tvøroyri	685 b	104741	TFL 21.9.71	Skeyti 21.9.71	1372	129			TFL	858	TFL 1/1
	Automatstað	Sandur	Sandur	358	104736	TFL 3.8.76	Ognarbrev	378	165			TFL	467	TFL 1/1
	Automatstað	Velbastað	Velbastaður	51	104755	Kongs. H. Brekkoplass	25.6.89 S1971/03	300	38	1200	1/ár	TFL	105	TFL 1/1
	Automatstað	Viðareiði	Viðareiði	162	104761	TFL 1.2.72	Skeyti 1.2.72	400	38			TFL	120	TFL 1/1
	Automatstað	Klaksvík A	Klaksvík	438 b	104756	TFL 21.4.70	Skeyti 13.7.70	1696	415			TFL	1.526	TFL 1/1
	Automatstað	Norðdepil	Norðdepil	139	104764	TFL 6.7.71	Skeyti 6.7.71	532	38			TFL	89	TFL 1/1
	Automatstað	Hvalba a	Hvalba	48 m	104733	TFL	Skeyti mangir	832	38			TFL	296	TFL 1/1
	Grundskr	Sandvíkarhj.	Tórshavn	1 gr		TFL	Skeyti	3848	0			TFL	2.700	TFL 1/1
	Grundskr	Sandvíkarhj.	Tórshavn	1 og		TFL	Skeyti	7484	0			TFL	0	TFL 1/1
	Kaðalbygn.	Tjørnuvík	Tjørnuvik	54 b	170399	TFL	24.9.93 Skeyti	1121	168			TFL	2.674	TFL 1/1
	Kaðalgreinara	Skriftstig	Tórshavn	1293		Tórsh. kommuna		leiga	10			TFL	57	TFL 1/1
	Kaðalgreinara	Sund	Tórshavn	1		TFL 18.9.82 154/82	(H.Berentsen)		15			TFL	107	TFL 1/1
	Kaðalgreinara	á Hálsi th1	Tórshavn	1361 b		Tórsh.kommuna	14.12.76 135/197	87	18			TFL	106	TFL 1/1
	Kaðalgreinara	Ø.I Gellsgøtu	Tórshavn	620 v (y)		TFL (Tórs. býrað)			19			TFL	156	TFL 1/1
	Kaðalgreinara	Kaldbak	Kaldbak	22 n		TFL 19.6.91	Skeyti	176	12			TFL	157	TFL 1/1
	Kaðalgreinara	Hoyvik	Tórshavn	(df) 1 dg		Hoyvíkahagi	13.9.78 102/78	90	52			TFL	400	TFL 1/1
	Kaðalgreinara	Landavegur	Tórshavn	917		Tórsh. Kommuna	16.3.84 16/65-19	100	20			TFL	146	TFL 1/1
	Kaðalgreinara	Grønlandsvegur	Tórshavn	888 (f)? fa		Tórsh. komm.	25.2.75 15/1675	100	13			TFL	72	TFL 1/1
	Kaðalgreinara	Argir k	Tórshavn			(Ó.J.Muller)	11.12.77	90	16			TFL	113	TFL 1/1

6013

Nr.	Slag	Stað	Adressa	Matr.nr.	Trygg.nr.	Ognarvirðisskifti	Leiga/loyvi	Gr. ekkð	Bygning	K.	Um	Stovnur	TFL' partur	Fordeiling
	Kaðalgreinari	Sandvágur	Sandvágur	28 b		TFL skeyti 30.9.76		188	10			TFL	57	TFL 1/1
	Kaðalgreinari	Sandur Krossve				Jarðarráð	Loyvi		10			TFL	47	TFL 1/1
	Kaðalgreinari	Øravíkarbl	Tvøroyri	94 a		Jarðarráðið	20.2.85 Dals og Ll	50	8	100	1/ár	TFL	47	TFL 1/1
	Kaðalgreinari	Mýrumar	Vestmanna	25		Kvívíkar nagi	24.6.75 byggil.		10			TFL	55	TFL 1/1
	Kaðalgreinari	Hvalvík	Hvalvík			Hvalvíkar Kommuna	2.5.84 byggil.		10			TFL	73	TFL 1/1
	Kaðalgreinari	Halderasvík	Halderasvík	182		Halderav komm	16.12.81 Byggiloy	10	10			TFL	71	TFL 1/1
	Kaðalgreinari	Sandavágur	Sandavágur	330		TFL ognarbr. 15.1.8		374	10			TFL	85	TFL 1/1
B0348	Kaðalgreinari	Tottir	Tottir			TFL	Loyvi	96	4			TFL	0	TFL 1/1
B0349	Kaðalgreinari	Sýrugøta	Sýrugøta			Bygdar.	Loyvi		5			TFL	0	TFL 1/1
B0351	Kaðalgreinari	Skáli	Skála	300 k		Bygdarráð	Loyvi	10	10			TFL	31	TFL 1/1
	Kaðalgreinari	Árnafjørður	Árnafjørður			Býráði	Loyvi		10			TFL	55	TFL 1/1
B0350	Kaðalgreinari	Ekduvík	Ekduvík	198	104725	TFL 11.2.77	Skeyti 11.2.77	152	10			TFL	28	TFL 1/1
	Kaðalgreinari	Klaksvík	Klaksvík	253 o		Býráði	Loyvi		10			TFL	55	TFL 1/1
B0354	Kaðalgreinari	Hellumar	Hellumas	9^1		TFL 24.7.81	25.5.81 B76/81	300	10			TFL	32	TFL 1/1
	Kaðalgreinari	Skálavík	Skálavík			Jarðarráð	Loyvi		10			TFL	47	TFL 1/1
B0402	Kaðalgreinari	Funningsbotn	Funningsbotn			Jarðarráð	Loyvi		10			TFL	34	TFL 1/1
	Kaðalgreinari	Hundadjógv	Hvalba			Jarðarráði	Olaf Jacobsen mu		7			TFL	31	TFL 1/1
	Kaðalgreinari	Famjin	Famjin		104729		ongi skjal munnligt		7			TFL	18	TFL 1/1
B0352	Kaðalgreinari	Nordagøta	Nordagøta			Bygdarráð ?	Loyvi		10			TFL	33	TFL 1/1
B0353	Kaðalgreinari	Glyvrar	Glyvrar	10^ a		Landsverk.	Loyvi		10			TFL	33	TFL 1/1
	Kaðalgreinari	Gjáareskarð	Gjáar		104757	Hagast/Funning	29.9.75 bygl.		10			TFL	29	TFL 1/1
	Kaðalgreinari	Hov	Hov	71 b		TFL 17.6.82	Skeyti 21.10.80	72	7			TFL	33	TFL 1/1
	Kaðalgreinari	Hvalba k	Hvalba	79 g		TFL 23.2.79	Ognarbrev 23.2.	56	7			TFL	34	TFL 1/1
	Kaðalgreinari	Á Stavnungi	Vágur	65 e			ongi skjal		7			TFL	29	TFL 1/1
	Kaðalgreinari	Øravík	Øravík				ongi skjal munnligt		7			TFL	27	TFL 1/1
	Kaðalgreinari	Sumba	Sumba	28 c	104723	TFL 22.5.74	Skeyti 22.5.74	207	14			TFL	37	TFL 1/1
	Kaðalgreinari	Við vatna	Vágur	505 b		TFL 6.1.77	Skeyti 6.1.77	90	9			TFL	40	TFL 1/1
	Kaðalgreinari	Kvívik	Kvívik	(309) (27)		TFL (P.Muller)	7.5.81 ognarbrev	27	10			TFL	67	TFL 1/1
	Kaðalgreinari	Hósvík	Hósvík	206		TFL 29.1.92	11.9.91 Skeyti	66	10			TFL	73	TFL 1/1
	Kaðalgreinari	Tvøroyrsvágur	Tvøroyri	4 d		TFL ikki tingl.		93	7			TFL	30	TFL 1/1
B0346	Kaðalgreinari	Saltnes I. [Rók	Saltnes	284		TFL 16.7.63	Skeyti 16.7.63	96	16			TFL	253	TFL 1/1
	Kaðalgreinari	Lopra	Lopra		104726	Lobransheegi	ongt skjal munnligt		7			TFL	16	TFL 1/1
	Kaðalgreinari	Porkeri	Porkeri				ongi skjal		7			TFL	31	TFL 1/1
B0355	Kaðalgreinari	Oyndarfjørður	Oyndarfjørður	14 d	080388	TFL 23.10.92	Skeyti 23.10.92	78	12			TFL	157	TFL 1/1
	Kaðalgreinari	Fróða	Fróba	23 f		TFL 1.7.75	Skeyti 17.7.75	126	7			TFL	30	TFL 1/1
	Kaðalgreinari	Sandvík	Sandvík		104730		ongt skjal munnligt		7			TFL	17	TFL 1/1
B0347	Kaðalgreinari	Strendur	Strendur	343 b		TFL 11.5.92	Skeyti 11.5.92	152	16			TFL	157	TFL 1/1
	Kaðalhús	Hvítanes	Hvítanes	111		TFL ikki fríjalu			0			TFL	0	TFL 1/1
	L.B.	Bøur	Bøur		80386	Skálin		85	0			TFL	0	TFL 1/1
	Motbrúka	Eiði m	Eiði	252c		Jenny Olsen	skeyti 17.8.90 ikki	20	20			TFL	118	TFL 1/1
	Radiostað	Sjúvoy	Sjúvoy	119	104746	TFL		53	10			TFL	28	TFL 1/1
	Radiostað	Spáreti	Vágur		06-005983	Jarameð.	Jardar. sátt 22.5.8		58	2000	1/ár	TFL	2.009	TFL 1/1
	Radiostað	Mikladalur	Mikladalur	119	104727	TFL 20.12.77	Skeyti 20.12.77	25	3			TFL	0	TFL 1/1

Mitt

Nr.	Slag	Stad	Adressa	Matr.nr.	Trygg.nr.	Ognarvidurskifti	Leigaavtoyvi	Gr. eldð	Bygning	Kr.	Um	Stovnur	TFL' partur	Fordeiling
	Radiostað	Húsar	Húsar	44	104766	Dómur 5.7.80	áður tinglýst	26	10	Selur??		TFL	30	TFL 1/1
	Radiostað	Kirkja	Kirkja	86	104720	TFL 6.4.92	Ognarbrav	456	17			TFL	62	TFL 1/1
	Radiostað	Svínoy eldi	Svínoy	155 a		Jarðarráð	Jarðarráð		12	100	1/ár	TFL	197	TFL 1/1
	Radiostað	Skopun	Skopun	822		TFL 21.3.77		299	13			TFL	72	TFL 1/1
	Radiostað	Froðblarnaldur	Tvøroyri		104718		Hagastýri 4.2.82		26	1331	1/ár	TFL	72	TFL 1/1
	Radiostað	Froðblarkambur	Froðba		104735		sí Nakkur		15	1331	1/ár	TFL	74	TFL 1/1
	Radiostað	Brúnaskarð r	Klaksvík	(1684)		Vágshagi	Loyvi		15			TFL	8	TFL 1/1
	Radiostað	Hálsur kl.	Klaksvík		104759	Vágshagi	Loyvi		9			TFL	41	TFL 1/1
	Radiostað	Klubbin	Kirkja		08-005945	Hagast. Kirkjuhagi	Loyvi		58			TFL	2.040	TFL 1/1
	Radiostað	Knúkur tn	Mykines		104722	Líðarhagi	Loyvi		58			TFL	548	TFL 1/1
B0345	Radiostað	Stóðlafjall	Sandavjørður	117 b	104745	Sak	Loyvi	625	30		1/ár	TFL	249	TFL 1/1
	Radiostað	Kunoy	Kunoy	64	104765		Loyvi		9			TFL	11	TFL 1/1
	Radiostað	Trøllanes	Trøllanes		104721	skal takast niður			2			TFL	13	TFL 1/1
	Radiostað gamla	Svínoy	Svínoy		104731	Jarðarráð	Jarðarráð		3			TFL	0	TFL 1/1
	Radiostað gamla	Húsareyn g	Tórshavn	1360					15			TFL	27	TFL 1/1
	Radiostað	Múli	Múli									TFL	0	TFL 1/1
	Radiostað	Borðan	Borðan									TFL	0	TFL 1/1
	Radiostað	Koltur	Koltur									TFL	0	TFL 1/1
	Radiostað	Flogvøllurin	Sørvág									TFL	0	TFL 1/1
	Radiostað	Reyðibarmur	Hvalba									TFL	0	TFL 1/1
	Radiostað	Hestoy	Hersir	89 ?	104753	Dómur 6.6.91		50	19			TFL	29	TFL 1/1
	Radiostað	Sandfell	Kaldbak									TFL	0	TFL 1/1
	Radiostað	Húsareyn ny	Tórshavn	1175 b	156137			1.000	392	5.000	1/ár	TFL	3.607	TFL 1/1
	Radiostað	Stóra Dímun	Stóra Dímun									TFL	0	TFL 1/1
	Radiostað FM	Eiðisskolur	Eiðisskollur		104724	Hagasl. Nordhelvt	12.10.77 leigavt.		23	10.000	50/ár	TFL	138	TFL 1/1
	Radiostað	Uppi á Varda	Tórshavn									TFL	0	TFL 1/1
	Sjókaðal		Tvøroyri	567								TFL	0	TFL 1/1
	Spegil	Argir s	Argir		080374	Uttanb. kommuna			18			TFL	0	TFL 1/1
	Telebúð/Skrivst.	á Hálsi	Tórshavn	1381f/e	151686	Matr nr 1381 f/e		5.400	1678			TFL	19.344	TFL 1/1
	Telebúð/Skrivst.	á Hálsi	Tórshavn	1381f/a	/116577							TFL	0	TFL 1/1
	Tænastumiðstað	Tinghúsv. 63	Tórshavn	V,7378,336X	184325	TFL		4823	729			TFL	11.138	TFL 1/1
	MF sendistað	Oyggjarvegur	Tórshavn						97			TFL	46,5	TFL 1/1
								61.445	7.173				73.076	

6115

Hjárit 2.1

Mastrar

Stað	Stað	Adressa	Oyggj	Etiket nr	Slag			Virði	Model	Býtlið	
Radiostað	Húsareyn	Tórshavn	Streymoy	R 0801	Mastur	25 m		17.500	4"list/	TFL 1/1	
Radiostað	Húsareyn	Tórshavn	Streymoy	R 0802	Mastur	125 m	TFL-part	465.000	3*90/1400	TFL 1/3	FL 2/3
Radiostað	Hesturin Hái	Vágur	Suðuroy	R 0803	Mastur	50 m	TFL-part	176.006	3*65/1250	TFL 1/3	FL 2/3
Radiostað	Brúnaskarð	Klaksvik	Borðoy	R 0804	Mastur	50 m	TFL-part	225.000	3*65/1250	TFL 1/3	FL 2/3
Radiostað	Froðbiarkambur	Tvøroyri	Suðuroy	R 0805	Mastur	15 m		12.000	4" SEV mast	TFL 1/1	
Radiostað	Stóðlafjall	Søldarfjørður	Eysturoy	R 0806	Mastur	15 m		12.000	4" SEV mast	TFL 1/1	
Telefonstað	Tinghúsvegur 3	Tórshavn	Streymoy	R 0807	Mastur	10 m		9.350	3*50/800	TFL 1/1	
Telefonstað	Velbastað	Velbastað	Streymoy	R 0808	Mastur	8 m		15.189	3*50/800	TFL 1/1	
Telefonstað	Miðvágur	Miðvágur	Vágoy	R 0809	Mastur	6 m		6.380	3*50/800	TFL 1/1	
Telefonstað	Nesvik	Nesvik	Streymoy	R 0810	Mastur	8 m		9.680	3*50/800	TFL 1/1	
Telefonstað	Eiði	Eiði	Eysturoy	R 0811	Mastur	6 m		8.580	3*50/800	TFL 1/1	
Radiostað	Froðbiarnakkur	Tvøroyri	Suðuroy	R 0812	Mastur	8 m		10.248	3*50/800	TFL 1/1	
Telefonstað	Sandur	Sandur	Sandoy	R 0813	Mastur	8 m		10.528	3*50/800	TFL 1/1	
Radiostað	Eysturhøvdi	Svínoy	Svínoy	R 0814	Mastur	14 m	TFL-part	11.875	3*50/800	TFL 1/3	FL 2/3
Radiostað	Eiðiskollur	Eiði	Eysturoy	R 0815	Mastur	20 m		93.000	3*50/800	TFL 1/1	
Telefonstað	Nólsoy	Nólsoy	Nólsoy	R 0816	Mastur	10 m		11.550	3*50/800	TFL 1/1	
Radiostað	Froðbiarkambur	Tvøroyri	Suðuroy	R 0817	Mastur	12 m		105.000	3*50/800	TFL 1/1	
Radiostað	Stóðlafjall	Søldarfjørður	Eysturoy	R 0818	Mastur	12 m		117.300	3*50/800	TFL 1/1	
Radiostað	Knúkur	Mykines	Mykines	R 0819	Mastur	8 m		20.034	3*50/800	TFL 1/1	
Radiostað	Knúkur	Mykines	Mykines	R 0820	Mastur	25 m		119.680	3*50/800	TFL 1/1	
Radiostað	Reyðibarmur	Hvalba	Suðuroy	R 0821	Mastur	6 m		2.310	??	TFL 1/1	
Natostað	Sandfelli	Mjørkadalur	Streymoy	R 0822	Mastur	7,5 m		23.400	4"xxhxxx	TFL 1/1	
Telefonstað	Viðareiði	Viðareiði	Viðoy	R 0823	Mastur	15 m		185.320	4*60/1250	TFL 1/1	
Radiostað	Kirkja	Kirkja	Fugloy	R 0824	Mastur	6 m		21.402	3*50/800	TFL 1/1	
Radiostað	Svínoy (eiði)	Svínoy	Svínoy	R 0825	Mastur	6 m		21.663	3*50/800	TFL 1/1	
Natostað	Sandfelli	Mjørkadalur	Streymoy	R 0826	Mastur	8 m		24.436	3*50/800	TFL 1/1	
Radiostað	Stóðlafjall	Søldarfjørður	Eysturoy	R 0827	Mastur	50 m		1.568.700	3*80/1500	TFL 1/1	
Radiostað	Klubbin	Kirkja	Fugloy	R 0828	Mastur	50 m		1,858,680	3*80/1500	TFL 1/1	
Radiostað	Spáefelli	Vágur	Suðuroy	R 0829	Mastur	50 m		1.584.240	3*80/1500	TFL 1/1	
Telefonstað	Fuglafjørður	Fuglafjørður	Eysturoy	R 0830	Mastur	15 m		193.130	4*60/1250	TFL 1/1	
Telefonstað	Rúnavik	Rúnavik	Eysturoy	R 0831	Mastur	30 m		501.320	4*100/1850	TFL 1/1	
Telefonstað	Miðvágur	Miðvágur	Vágoy	R 0832	Mastur	30 m		595.560	4*100/1850	TFL 1/1	
Telefonstað	Klaksvik	Klaksvik	Borðoy	R 0833	Mastur	15 m		199.360	4*60/1250	TFL 1/1	
Radiostað	Hálsurin Kl.	Klaksvik	Borðoy	R 0834	Mastur	15 m		186.010	4*60/1250	TFL 1/1	
Radiostað	Mikladal - bygdin	Mikladal	Kalsoy	R 0835	Mastur	6 m		23.674	3*50*800	TFL 1/1	
Radiostað	Hálsur Th.	Tórshavn	Streymoy	R 0836	Mastur	15 m		196.000	4*60/1250	TFL 1/1	
Telefonstað	Velbastaður	Velbastað	Streymoy	R 0837	Mastur	15 m		202.500	4*60/1250	TFL 1/1	
Radiostað	Skopun	Skopun	Sandoy	R 0838	Mastur	15 m		157.430	4*60/1250	TFL 1/1	
Telefonstað	Sandur	Sandur	Sandoy	R 0839	Mastur	7,5 m		12.900	3"	TFL 1/1	
Telefonstað	Nesvik	Nesvik	Streymoy	R 0840	Mastur	22,5 m		177.000	4*60/1250	TFL 1/1	
Radiostað	Slættafjall	Mikladal	Kalsoy	R 0841	Mastur	9 m	TFL-part	12.000	3*50/800	TFL 1/3	FL 2/3
Radiostað	Stóðlafjall	Søldarfjørður	Eysturoy	R 0842	Mastur	6 m rør		20.000	TFL	TFL 1/1	
Spegil	Argir	Argir	Streymoy	R 0420	Antennu spegil			18.150		TFL 1/1	

9.041.079

Hjáritt 2.2

Mastrar við tilknýti til Útvarps- og Sjónvarpssendistøðlr

Stað	Stað	Adressa	Oyggj	Etiket nr	Slag		Model	Býtl
Radiostað	Nes Hvalba	Hvalba	Suðuroy	R 1001	Mastur	15 m	4*45/950	FL 1/1
Radiostað	Prestangi	Miðvágur	Vágoy	R 1002	Mastur	15 m	4*45/950	FL 1/1
Radiostað	Skeldin	Sørvágur	Vágoy	R 1003	Mastur	15 m	4*45/950	FL 1/1
Radiostað	Øravikarfjð	Tvøroyri	Suðuroy	R 1004	Mastur	15 m	4*45*950	FL 1/1
Radiostað	Sunnangróthaygg	Funningsfjørður	Eysturoy	R 1005	Mastur	4 m rør	TFL	FL 1/1
Radiostað	Akslaklettur	Lamba	Eysturoy	R 1006	Mastur	6 m rør	TFL	FL 1/1
Radiostað	Knúkur	Skopun	Sandoy	R 1007	Mastur	4 m		FL 1/1
Radiostað	I Dalum	Vestmanna	Streymoy	R 1008	Mastur	15 m	4*45/950	FL 1/1
Radiostað	Toftalið	Vágur	Suðuroy	R 1009	Mastur	15 m	4*45/950	FL 1/1
Radiostað	Á Neshamri	Mørkranes	Eysturoy	R 1010	Mastur	6 m rør	TFL	FL 1/1
Radiostað	Á Hjallabrúnni	Oyri	Eysturoy	R 1012	Mastur	6 m rør	TFL	FL 1/1
Radiostað	Uppi i Keri	Selatrað	Eysturoy	R 1013	Mastur	6 m rør	TFL	FL 1/1
Radiostað	Kambsendi	Porkeri	Suðuroy	R 1014	Mastur	7,5 m	4*45/??	FL 1/1
Radiostað	Hagabrekka	Skælavik	Sandoy	R 1015	Mastur	15 m	4*45/950	FL 1/1
Radiostað	Vállheiður	Dalur	Sandoy	R 1016	Mastur	15 m	4*45/950	FL 1/1
Radiostað	Á Tanganum	Húsavik	Sandoy	R 1017	Mastur	6 m rør	TFL	FL 1/1
Radiostað	Uppi á Garði	Ljósá	Eysturoy	R 1018	Mastur	6 m rør	TFL	FL 1/1
Radiostað	Við Toftá	Norðtoftir	Borðoy	R 1019	Mastur	6 m rør	TFL	FL 1/1
Radiostað	Undir Hamri	Árnafjørður	Borðoy	R 1020	Mastur	6 m rør	TFL	FL 1/1
Radiostað	Miðvag	Klaksvik	Borðoy	R 1021	Mastur	6 m rør	TFL	FL 1/1
Radiostað	Klummurhamar	Sumba	Suðuroy	R 1022	Mastur	6 m rør	TFL	FL 1/1
Radiostað	Uppi á Kletti	Famjin	Suðuroy	R 1023	Mastur	6 m rør	TFL	FL 1/1
Radiostað	Hvitthjallum	Kvivik	Streymoy	R 1024	Mastur	6 m rør	TFL	FL 1/1
Radiostað	Frammi I Haga	Stykkið	Streymoy	R 1025	Mastur	6 m rør	TFL	FL 1/1
Radiostað	Heiðahagi	Argir	Streymoy	R 1026	Mastur	6 m rør	TFL	FL 1/1
Radiostað	Á Fjalli	Sandvik	Suðuroy	R 1027	Mastur rør			FL 1/1
Radiostað	Á Fjalli	Sandvik	Suðuroy	R 1028	Mastur rør			FL 1/1
Radiostað	Akraberg	Sumba	Suðuroy	R 1029	Mastur	140 m	3*95/1500	FL 1/1
Radiostað	Mikladal / tunnil	Mikladal	Kalsoy	R 1030	Mastur	6 m rør	TFL	FL 1/1
Radiostað	Trøllanes / tunnil	Trøllanes	Kalsoy	R 1031	Mastur	6 m rør	TFL	FL 1/1
Radiostað	Triggjarár	Kollafjørð	Streymoy	R 1032	Mastur	15 m	4*45/950	FL 1/1

Hjárit 3.1

Sendinet	Stað	Adr.	Oyggj	Anlegg	Slag	Ognari
SVF	Hesturin Hái	Vágur	Syðuroy	SV - Móttakari	RTV 72	FL 1/1
SVF	Húsareyn	Tórshavn	Streymoy	SV - Tx/Rx Com stoð	Storno	FL 1/1
SVF	Verstan	Tórshavn	Streymoy	SV Modulator		FL 1/1
SVF	Húsareyn	Tórshavn	Streymoy	SV Modulator (eyka)		FL 1/1
SVF	Húsareyn	Tórshavn	Streymoy	SV Sendari	PCN 1213 AH/1	FL 1/1
SVF	Miðvag	Klaksvík	Borðoy	SV Umsetari	PVV 551	FL 1/1
SVF	Trøllanes / tunnil	Trøllanes	Kalsoy	SV Sendari	PVV 551	FL 1/1
SVF	Undir Hamri	Árnafjørður	Borðoy	SV Sendari	PVV 551	FL 1/1
SVF	Verstan	Tórshavn	Streymoy	SV Sendari	NM 1410-10U	FL 1/1
SVF	Á Fjalli	Sandvík	Suðuroy	SV Sendari	PVV 551	FL 1/1
SVF	Akslaklettur	Lamba	Eysturoy	SV Umsetari		FL 1/1
SVF	Brúnaskarð	Klaksvík	Borðoy	SV Umsetari	NM 1402-10V	FL 1/1
SVF	Eiðiskollur	Eiði	Eysturoy	SV Umsetari	NM 1402-10V	FL 1/1
SVF	Eysturhøvdi	Svínoy	Svínoy	SV Umsetari	NM 1402-10V	FL 1/1
SVF	Frammi í Haga	Stykkið	Streymoy	SV Umsetari	PVV 551	FL 1/1
SVF	Froðbiarnakkur	Tvøroyri	Suðuroy	SV Umsetarí	NM 1401-01V	FL 1/1
SVF	Hagabrekka	Skálavík	Sandoy	SV Umsetarí	PVV 551	FL 1/1
SVF	Heiðahagi	Argir	Streymoy	SV Umsetari	PVV 551	FL 1/1
SVF	Hellumar	Hellumar	Eysturoy	SV Umsetari	PVV 551	FL 1/1
SVF	Hvitthjøllum	Kvívík	Streymoy	SV Umsetari	PVV 551	FL 1/1
SVF	Hálsurin Kl.	Klaksvík	Borðoy	SV Umsetari	NM 1402-10U	FL 1/1
SVF	Húsar	Húsar	Kalsoy	SV Umsetari	NM 1401-01V	FL 1/1
SVF	Kambsendi	Porkeri	Suðuroy	SV Umsetari	PVV 551	FL 1/1
SVF	Klummarhamar	Sumba	Suðuroy	SV Umsetari	PVV 551	FL 1/1
SVF	Knúkur	Skopun	Sandoy	SV Umsetari	NM 1402-10V	FL 1/1
SVF	Knúkur	Mykines	Mykines	SV Umsetari	PVV 551	FL 1/1
SVF	Mykines bygd	Mykines	Mykines	SV Umsetarí	PVV 551	FL 1/1
SVF	Nes Hvalba	Hvalba	Suðuroy	SV Umsetarí	NM 1401-01V	FL 1/1
SVF	Nesvík	Nesvík	Streymoy	SV Umsetari	PVV 551	FL 1/1
SVF	Prestangi	Miðvágur	Vágoy	SV Umsetari	NM 1401-01V	FL 1/1
SVF	Sandfelli	Mjørkadalur	Streymoy	SV Umsetari	NM 1402-10V	FL 1/1
SVF	Skeiðin	Sørvágur	Vágoy	SV Umsetari	NM 1401-01V	FL 1/1
SVF	Slættafjall	Mikladal	Kalsoy	SV Umsetari	NM 1402-10V	FL 1/1
SVF	Stóðlafjall	Søldarfjørður	Eysturoy	SV Umsetari	NM 1424-100V	FL 1/1
SVF	Sunnangrótheygs	Funningsfjør	Eysturoy	SV Umsetari	PVV 551	FL 1/1
SVF	Toftalið	Vágur	Suðuroy	SV Umsetari	PVV 551	FL 1/1
SVF	Triggjarálr	Kollafjørð	Streymoy	SV Umsetari	PVV 551	FL 1/1
SVF	Uppi á Garði	Ljósá	Eysturoy	SV Umsetari	PVV 551	FL 1/1
SVF	Uppi á Kletti	Famjin	Suðuroy	SV Umsetari	PVV 551	FL 1/1
SVF	Uppi í Keri	Selatrað	Eysturoy	SV Umsetari	NM 1401-01V	FL 1/1
SVF	Við Toftá	Norðtorftir	Borðoy	SV Umsetari	PVV 551	FL 1/1
SVF	Viðareiði	Viðareiði	Viðoy	SV Umsetari	PVV551	FL 1/1
SVF	Válheiður	Dalur	Sandoy	SV Umsetari	P VV 551	FL 1/1
SVF	Á Hjallabrúnni	Oyri	Eysturoy	SV Umsetari	NM 1401-01V	FL 1/1
SVF	Á Miðhjalla	Saksun	Streymoy	SV Umsetari	NM 1401-01V	FL 1/1
SVF	Á Neshamri	Morkranes	Eysturoy	SV Umsetari	NM 1401-01V	FL 1/1
SVF	Á Tanganum	Húsavik	Sandoy	SV Umsetari	PVV 551	FL 1/1
SVF	Í Delum	Vestmanna	Streymoy	SV Umsetari	NM 1401-01V	FL 1/1
SVF	Øravíkarlið	Tvøroyri	Suðuroy	SV Umsetari	NM 1402-10V	FL 1/1
SVF	Mikladal / tunnil	Mikladal	Kalsoy	SV móttakari		FL 1/1
SVF	Á Fjalli	Sandvik	Suðuroy	SV móttakari		FL 1/1
SVF	Hesturin Hái	Vágur	Suðuroy	SV sendari	TSV-1223SH	FL 1/1
SVF	Klaksvík	Klaksvik	Borðoy	SV Umsetari		FL 1/1

Hjárit 3.2

Sendinet	Stað	Adr.	Oyggj	Anlegg	Slag	Ognarf
FM	Brúnaskarð	Klaksvík	Borðoy	FM Umsetari	SR 536 C1	FL 1/1
FM	Eiðiskollur	Eiði	Eysturoy	FM Umsetari	HPT-FMR	FL 1/1
FM	Eysturhevdi	Svínoy	Svínoy	FM Umsetari	HPT-FMR	FL 1/1
FM	Hesturin Hái	Vágur	Suðuroy	FM Umsetari	SR 536 C1	FL 1/1
FM	Húsareyn	Tórshavn	Streymoy	FM sendari	SR 536 C1	FL 1/1
FM	Knúkur	Mykines	Mykines	FM Umsetari		FL 1/1
FM	Mikladal / tunnil	Mikladal	Kalsoy	FM Móttakari		FL 1/1
FM	Nes Hvalba	Hvalba	Suðuroy	FM Umsetari	HPT-FMR	FL 1/1
FM	Prestfangi	Miðvágur	Vágoy	FM Umsetari	MF20RT/B	FL 1/1
FM	Skeiðin	Sørvágur	Vágoy	FM Umsetari	MF20RT/B	FL 1/1
FM	Trøllanes / tunnil	Trøllanes	Kalsoy	FM Umsetari	ERU 221	FL 1/1
FM	Válheiður	Dalur	Sandoy	FM Umsetari	ERU 221	FL 1/1
FM	Á Miðhjalla	Saksun	Streymoy	FM Umsetari		FL 1/1
FM	Í Døkum	Vestmanna	Streymoy	FM Umsetari	MF20RT/B	FL 1/1

Hjáritt 3.3

Millumbyggju stöð á Akrabyrgi

Sandinet	Stöð	Adressa	Oyggj	Anlegg	Ognari
MB	Akraberg	Sumba	Suðuroy	AM-sendari	FL 1/1
MB	Akraberg	Sumba	Suðuroy	AM-orkuverk	FL 1/1
MB	Akraberg	Sumba	Suðuroy	Sendara bygningur	FL 1/1
MB	Akraberg	Sumba	Suðuroy	Orku bygningur	FL 1/1
MB	Akraberg	Sumba	Suðuroy	Antenn anlegg	FL 1/1
MB	Akraberg	Sumba	Suðuroy	Antennu bygningur	FL 1/1

33 Uppskot til løgtingslóg um almennan fløgugrunn

Ár 1997, hósdagin 4. desember legði Lasse Klein, løgtingsmaður, vegna Kristiliga Fólkaflokkin, Føroya Framburðs- og Fiskivinnuflokk fram soljóðandi:

U p p s k o t
til
løgtingslóg um almennan fløgugrunn

§ 1.

Almenni fløgugrunnurin hevur til endamáls at tryggja, at almennu fløgurnar, sum tað almenna ger, verða raðfestar í eini ætlan, sum verða samtyktar við løgtingslóg.

§ 2.

Fløgugrunnurin er ogn landskassans. Umframt játtaðar fløgur yvir løgtingsins fíggjarlóg fær grunnurin fæið útvegað við játtanum á fíggjarløgtingslógunum, rentuinntøku og býti av avlopi landskassans upp til 20%.

§ 3.

Røkkur peningur grunsins ikki til tær játtanir á løgtings fíggjarlógini, sum verða hildnar neyðugar, skal landsstýrið leggja serstakt løgtingslógaruppskot á ting um hetta.

§ 4.

Fløgugrunnurin umfatar hesar fløgur:

a) ferðaskip hjá Strandfaraskipum Landsins,
b) undirsjóvartunlar,
c) tunlar og nýggjar vegagerðir,
d) útbygging av flogvøllinum,
e) útbygging av vaktar- og bjargingartænastuni,
f) útbygging av heilsuverkinum, sjúkrahús v.m.,
g) umsitingarbygningar hjá tí almenna v.m.,
h) skúlar v.m.,
i) mentanarhús,
j) almannabygningar,
k) aðrar neyðugar almennar byggingar.

§ 5.

Sett verður ein nevnd at viðgera fløgutørvin komandi árini og at gera tilmæli til landsstýrið um fløgutørv, rakstur, møguliga lánsjáttan og onnur viðurskifti viðvíkjandi fløgutørvi.

Stk. 2. Nevndin hevur 7 limir og 7 varalimir. Landsstýrið velur teir. Ein skal vera búskaparfrøðingur, og ein skal vera hagfrøðingur. Nevdin verður vald fyri 4 ár Landsstýrið tilnevnir formannin. Nevndin ger sjálv starvsskipan sína í mðr. aftaná, at hon er sett, og verður hon at staðfesta við løgtingslóg.

Stk. 3. Landsstýrismaðurin í fíggjarmálum skal taka stig til, at fløguætlanin verður løgd fyri tingið til viðgerðar, sambært § 51, stk 4, í Tingskipan Føroya Løgtings. Skrivlig frásøgn frá orðaskiftinum skal sendast tingmonnum, løgmanni og landsstýrismonnum.

Stk. 4. Landsstýrismaðurin í fíggjarmálum hevur skyldu at samskipa og raðfesta allan fløgutørv, og skulu allir landsstýrismenn lata gera eina fløguætlan yvir síni málsøkir, aftaná viðgerðina sambært stk. 3. og hava landsstýrismenn skyldu at lata nevndini alt tilfar.

Stk. 5. Ætlanin skal greitt lýsa fløgurtørvin hjá føroyska samfelagnum 5 tey næstu árini. Tørvurin á fløgum skal sendast tinginum til viðgerðar sambært stk. 3 av landsstýrismanninum í fíggjarmálum, eins og tingið skal viðgera fløgutørv samfelagsins 2. hvørt ár.

Stk. 6. Nevndin skal søkja sær sakkøna hjálp hjá landsstýrismanninum í fíggjarmálum.

§ 6.

Ongar fløgur heldur ikki nýfløgur kunnu fremjast uttan við serstakari løgtingslóg.

§ 7.

Landsstýrið umsitur grunnin og kann áleggja, Gjaldstovuni, Landsbankanum ella grunni at umsita fløgujáttanina.

§ 8.

Í sambandi við útbyggingarætlanir eigur viðkomandi fløga at lýsa fíggjarviðurskiftini í samfelagnum, tørvin á viðkomandi málsøki, umframt stýringina av búskapinum í Føroyum sum heild.

Stk. 2. Landsstýrið verður heimilað at seta nærri reglur fyri virki grunsins, harundir starvsetan og áramál fyri fløgum.

§ 9.

Henda løgtingslóg kemur í gildi dagin eftir, at hon er samtykt.

Almennar viðmerkingar

1. Endamálið við lógaruppskotinum er , at allar íløgur, sum tað almenna ger, verða tryggjaðar í eini raðfesting. Føroya Løgting skal samtykkja endaligu ætlanina.
2. Íløgugrunnurin er ogn landskassans. Allar játtaðar íløgur falla í grunnin. Grunnurin fær fæið útvegað við játtanum á fíggjarløgtinglógum, rentuinntøku og býti av avlopi landskassans upp til 20%.
3. Røkkur peningurin ikki til, er neyðugt, at landsstýrið leggur serstakt lógaruppskot fyri tingið um hetta.
4. Yvirlit yvir íløgutørvin, sum skal lýsast, áðrenn arbeiðini verða sett í verk.
5. Landsstýrismaðurin í fíggjarmálum hevur skyldu til at lata íløguætlan gera, og til tess at hjálpa sær í hesum arbeiði verður ein nevnd sett at samskipa arbeiðið. Aftaná at vit hava fingið nýggja stýrisskipanarlóg, vil onkur møguliga halda, at tað er løgið, at landsstýrismaðurin í fíggjarmálum skal taka stig til at samskipa hetta arbeiðið, og at tað er meira ein spurningur um at taka arbeiði úr hondunum á hinum landsstýrismonnunum. Tað er ikki ætlanin. Talan er bert um ein praktiskan spurning um at fáa raðfest ingina gjørda, og tá talan er um íløgur, so er eisini talan um pening, og er hetta orsøkin til, at neyðugt er at ásanna, at ein má og skal hava ábyrgdina fyri at tryggja, at almennu íløgurnar verða raðfestar. Harumfrant kemur ein slík skipan sum hendan at lætta munandi um arbeiðsgongdina, og aftaná at arbeiðið í sambandi við raðfestingina er gjørt, eigur landsstýrismaðurin á avarandi málsøki ábyrgdina av at fremja ætlanir.
6. Tað hevur stóran týdning, at íløgur, sum verða gjørdar, verða gjørdar sambært løgtinglóg, og at ongar íløgur kunnu fremjast, uttan lógarkarmurin er í lagi.
7. Tað verður mett náttúrligt, at tað er landsstýrismaðurin í fíggjarmálum, sum umsitur grunnin, og at hann kann áleggja øðrum almennum stovnum at umsita íløgujátlanir, sum falla til grunnin.
8. Áðrenn nøkur íløga yvirhøvur kann fremjast, er neyðugt, at íløgurnar verða rætt lýstar, og taka hædd fyri fíggjarviðurskiftunum í samfelagnum, tørvin á málsøkjum, umframt tekur hædd fyri stýringini av búskapinum í Føroyum sum heild.

Viðmerkingar

Høvuðstrupulleikin við íløgutørvinum í Føroyum tey seinastu mongu árini hevur verið, at eingin raðfesting er farin fram av íløgunum, og einki fyrilit er tikið fyri at tryggja eina raðfesting, sum átti at verið ein náttúrligur partur av politiska arbeiðinum.

Alt ov ofta koma íløgurnar upp í røkur, og torført er at meta um, hvar íløga átti at verið framd fram um eina aðra.

Ein almenn politisk íløguætlan hevði í størri mun tryggjað eina nágreiniligari viðgerð, og hevði skapt tryggari politisk viðurskiftir, og politiska skipanin hevði ikki verið hótt við ótrygdleika.

Fyrimunurin við einum tílíkum lógaruppskoti sum hesum hevði eisini verið, at áðrenn viðgerðirnar fara fram, skulu íløgurnar raðfestast og peningurin avsetast á løgujáttan.

Sum nú er, valdar ótryggleiki á nærum øllum økjum, og politisku markeringarnar ganga fram um tørvin á sakligari viðgerð.

Ein tílík íløguætlan hevði eisini í størri mun tryggjað javnvág soleiðis, at almennu íløgurnar í størri mun taka hædd fyri spurninginum um bygdamenning. Eisini fyri borgaran, sum hevur møguleika at fylgja við, nær ætlanir verða framdar.

1. viðgerð 16. desember 1997. Uppskotið varð beint í fíggjarnevndina, sum fríggjadagin 13. februar 1998 legði fram soljóðandi:

Álit

Málið varð lagt fram av Kristiliga Fólkatlokkinum, Føroya Framburðs- og Fiskivinnuflokki tann 4. desember 1997 og eftir 1. viðgerð tann 16. desember 1997 beint í fíggjarnevndina.

Nevndin hevur viðgjørt málið á fundum 21. januar 1998, 28. januar 1998 og 30. januar 1998.

Eftir uppskotinum frá Kristiliga Fólkaflokkinum, Føroya Framburðs- og Fiskivinnuflokki skal ein grunnur stovnast, sum skal fíggja allar almennar íløgur.

Fíggjarnevndin hevur undir viðgerðini havt fund við landsstýrismannin í fíggjarmálum, Anfinn Kalls-berg, Leif Abrahamsen, Føroya Gjaldstovu og Kára Petersen, Fíggjar- og Búskaparstýrið, um skipanina við almennum grunnum sum heild.

Áskoðanin hjá umsitingini er, at alt alment virksemi skal avspeglast á fíggjarløgtingslógini, eisini allar almennar íløgur. Hetta er orsøkin til, at flest allir almennir grunnar eru tiknir av hesi seinastu árini, og peningurin í grunnunum liggur nú í landskassans gjaldføri.

Fíggjarnevndin heldur tankan í uppskotinum frá Kristiliga Fólkaflokkinum, Føroya Framburðs- og Fiskivinnuflokki um at leggja eina ætlan fyri teimum almennu íløgunum vera góðan. Tað er ynskiligt, at ein slík ætlan og helst eisini raðfesting verður gjørd, og at málið í síni heild verður umrøtt á tingi við jøvnum millumbilum. Hetta forðar ikki fyri, at broytingar ikki kunna gerast í ætlanini, men fíggjarnevndin heldur, at betri stýring hevði verið á teimum almennu íløgunum, um ein slík ætlan varð gjørd.

Fíggjarnevndin heldur ikki, at tað er rætt at stovna ein grunn at fíggja og umsita allar tær almennu íløgurnar. Hetta gongur eisini ímóti politisku stevnuni frá seinastu árini, ið sum heild hevur miðað eftir, at alt alment virksemi skal síggjast á fíggjarløgtingslógini.

Fíggjarnevndin er tí samd um at mæla tinginum frá at samtykkja uppskotið.

2. viðgerð týsdagin 17. februar 1998. Uppskotið fallið 3-1-22.

34 Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um húsarhaldsskúlar

Ár 1997 hósdagin tann 18. december legði Lasse Klein, løgtingsmaður, vegna seg sjálvan og løgtingsmeninar Vilhelm Johannesen, Tord J. Nielsen, Heina O. Heinesen og Álv Zachariasen fram soljóðandi:

U p p s k o t
til
løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um húsarhaldsskúlar

§ 1.

Í løgtingslóg nr. 66 frá 13. mai 1992 um húsarhaldsskúlar, sum broytt við løgtingslóg nr. 67 frá 20. mai 1996, verða gjørdar hesar broytingar:

§ 12, stk. 2 verður orðað soleiðis: Næmingunum verður veittur stuðul, sum skal útgjaldast næmingunum sjálvum. Nærri reglur um veiting av næmingastuðningi verða ásettar av landsstýrinum.

§ 2.

Henda lóg kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

Stk. 2. Samstundis fer danski teksturin í lóg nr. 66 frá 13. mai 1992, sum broytt við løgtingslóg nr. 67 frá 20. mai 1996, úr gildi.

Viðmerkingar:

Fleiri og fleiri ungfólk fara á húsarhaldsskúla í Danmark, hóast áhugin fyri føroyska húsarhaldsskúlunum er stórur.

Orsøkin er fyrst og fremst tann, at næmingar, sum verða upptiknir á húsarhaldsskúla í Føroyum, fáa boð um at gjalda kr. 10.000,00 fyri skeiðið, og at teir ongan næmingastuðning fáa útgoldnan.

Fört hevur verið fram, at næmingastuðningurin er fróknaður úrliga raksturin av skúlanum, hetta hóast raksturin hevur lað sera trupult, og at tann parturin, sum róptur verður næmingastuðningur, meira er enn náttúrligur partur av rakstrinum av skúlanum.

Verður skipanin ikki broytt, kann roknast við, at áhugin fyri skúlanum minkar niður í einki, og grundarlagið fyri skúlanum verður burtur, hetta tí at næmingarnir ikki kunnu fáa somu søndir, sum næmingar á donskum skúlum.

1. viðgerð fríggjadagin 16. januar 1998. Uppskotið verð beint í mentanarnevndina, sum 20. februar 1998 legði fram soljóðandi:

Álit

Málið er lagt fram av 5 tingmonnum 18. desember 1997 og eftir 1. viðgerð 16. januar 1998 beint í mentanarnevndina.

Nevndin hevur viðgjørt málið og hevur undir viðgerðini havt fund við landsstýrismannin í skúlamálum. Landsstýrismaðurin hevur upplýst, at umsitingin arbeiðir við spurninginum um at fáa næmingarnar á húsarhaldsskúlunum fevndar av reglunum í lógini um útbúgvingarstuðul.

Ein meirluti í nevndini (Bjarni Djurholm, Lisbeth Petersen, Maria Hansen, Signar á Brúnni, Marita Petersen) tekur ikki undir við málinum og mælir løgtinginum frá at samtykkja uppskotið.

Nevndin tekur tó undir við endamálinum at betra um grundarlagið fyri húsarhaldsskúlunum í Føroyum og heitir tí á landsstýrismannin um at virka fyri, at næmingarnir verða fevndir av reglunum í lógini um útbúgvingarstuðul.

Ein minniluti (Jenis av Rana og Lasse Klein) mælir løgtinginum til at samtykka uppskotið.

2. viðgerð týsdagin 24. februar 1998. §§ 1 og 2 fullu 12-1-12. Uppskotið fallið.

35 Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um áseting av skatti til landskassan

Ár 1997 týsdagin 2.desember, legði Anfinn Kallsberg, landsstýrismaður, vegna landsstýrið fram soljóðandi:

Uppskot
til
broyting í løgtingslóg um áseting av skatti til landskassan

§ 1.

Í løgtingslóg nr. 87 frá 1. september 1983 um áseting av skatti til landskassan við seinni broytingum verða gjørdar hesar broytingar:

1) Lógarheitið verður broytt til:
"Løgtingslóg um áseting av skatti".

2) Sum nýggj § 9 verður sett:
"**§ 9.** Toll- og Skattaráð Føroya kann loyva, at partafeløg og/ella lutafeløg verða samskattaði, tá treytað av, at feløgini hava sama roknskaparár og eru heimahoyrandi í Føroyum. Loyvi verður bert givið, um talan er um náttúru- og tóttarfe

løg, og er hartil treytað av, at móðurfelagið, antin einsamalt ella saman við einum ella fleiri av dótturfeløgum, ið koma undir samskattingina, eigur allar kapitalpartar í teimum dótturfeløgum samskattingin viðvíkir.

Stk. 2. Hall, sum er frá tíðini áðrenn feløgini vórðu samskattaði, kann einans dragast frá eftir § 33, nr. 5 í samtíðarskattalógini í felagsins egna yvirskoti.

Stk. 3. Fyri samskattaði feløg ábyrgist móðurfelagið fyri tí samlaða inntøkuskattinum viðvíkjandi inntøkuárinum. Móðurfelagið ábyrgist eisini fyri hækkingum í inntøkuskattinum fyri árini undan samskattingini. Lækkingar í inntøkuskattinum hjá samskattaðu feløgunum skulu gjaldast móðurfelagnum, eisini tá tað snýr seg um skattaár undan samskattingini. Tey samskattaðu feløgini bera samábyrgd fyri inntøkuskatti viðvíkjandi inntøkuárinum.

Stk. 4. Landsstýrismanninum í skattamálum verður heimilað at áseta nærri treytir fyri samskatting."

3) § 9 verður eftir hetta § 10.

§ 2.

Henda lóg kemur í gildi 1. januar 1998, og er galdandi fyri samanleggingar frá hesum degi.

Viðmerkingar:

Í arbeiðnum at tilevna hesar lógir, er útgangsstøðið tikið í donsku reglunum um samskatting. Donsku reglurnar finnast sum ein grein í Selskabsskatteloven.

Umframt samskatting av donskum feløgum, umfatar danska lógin eisini samskatting millum donsk móðurfeløg og útlendsk dótturfeløg.

Tá talan skal vera um eina einfalda lóg, er rættast at halda seg til føroysk feløg. Heldur ikki tykist tað vera serliga átroðkandi í løtuni at gera reglur fyri útlendsk dótturfeløg, serliga tá hugsað verður um, at hesi skulu undir øllum umstøðum gjalda skatt av avlopinum í avvarðandi landi. Tað er sera trupult og tíðarkrevjandi hjá umsitingini at hava við feløg at gera, sum eru heimahoyrandi í einum øðrum landi. Fyri at fáa reglurnar so einfaldar sum til ber og fyri at gera umsitingina so letta og einfalda sum gjørligt, er niðurstøðan, at feløg, sum eru heimahoyrandi uttanlands, ikki skulu kunnu nýta reglurnar.

Í § 54, stk. 1, 2. pkt. í skattalógini verður sagt, at reglurnar um hvussu skatturin til landskassan fyri m.a. feløg verður útroknaður, verða ásettar við serstakari løgtingslóg. Mælt verður tí til, at reglan um samskatting verður sett í ásetingarlógina.

Viðmerkingar til tær einstøku greinirnar

1) Talan er um eina nágreining av galdandi rætti.

2) Í stk. 1 er ásett, at partafeløg, smápartafeløg, smb. § 135 í smápartafelagslógini og/ella lutafeløg kunnu nýta hesa reglu. Treytin fyri hesum er, at Toll- og Skattaráð Føroya gevur loyvi til samskattingina eftir ávísum reglum. Talan skal harafturat vera um móður/dótturfeløg, sum eru heimahoyrandi í Føroyum. Samskatting verður sostatt loyvd, tá talan er um konsern, har móðurfelagið eigur allan partapeningin í dótturfelagnum/-feløgunum. Tað kann ikki koma uppá tal, at fleiri lutafeløg verða samskattaði, men eitt lutafelag kann vera móðurfelag í eini konsern.

Um talan er um móðurfelag, sum hevur fleiri dótturfeløg, kunnu hesi velja, hvørji feløg skulu vera við í samskattingini, t.v.s. at eitt ella fleiri dótturfeløg kunnu velja at vera uttanfyri samskattingina.
Samskatting kann eisini fevna um dótturdóttirfeløg o.s.fr..

Stk. 2 viðvíkir halli, sum stavar frá tíðini áðrenn samskattingina.

Hall, sum eitt felag hevur havt í tíðini áðrenn samskattingin tók við, kann bert dragast frá í vinningi hjá hesum sama felagi eftir reglunum í § 33, nr. 5 í skattalógini.

Um roknskaparárið hjá samskattaðu feløgunum er t.d. almanakkaárið, og hesi velja at vera samskattaði frá 1/1-1998, kann hall frá 1997 og eldri árum ikki dragast frá í samskattaðu inntøkuni, men bert í møguligum vinningi hjá sama felagi.

Um eitt samskattað felag í einum árið fær neyðskuldarsemju ella skuldareftirgeving ella avtala verður gjørd um sjálvboðna skuldarsemju, verður avmarking eftir reglunum í § 33, nr. 5 b í skattalógini bert framd í felagsins egna halli. Um hall framvegis tá er, verður restin flutt til frádrátt hjá hinum samskattaðu feløgunum. Hetta er tó sjálvsagt treytað av, at hallið ikki stavar frá tíðini undan at samskattingin tók við.

Stk. 3 ásetir, hvør heftir fyri skattakravi/-krøvum av samlaðu skattskyldugu inntøkuni.

Samskattaði feløg hava framvegis skyldu til at gera eina sjálvstøðuga uppgerð av teirra skattskyldugu inntøku saman við egnari sjálvuppgávu.

Inntøkan hjá øllum feløgunum, sum eru við í samskattingini, verður tald saman og verður uppgivin samlað á sjálvuppgávuni hjá móðurfelagnum, sum verður latin Toll- og Skattstovu Føroya í tí økinum, har heimakommunan hjá móðurfelagnum er.

Skattur og rentur verða kravd frá móðurfelagnum, meðan øll samskattaðu feløgini hefta solidariskt fyri hesum krøvunum.

Møguligar afturgjaldingar verða goldnar móðurfelagnum.

Landsstýrismanninum er heimilað at gera eina kunngerð, sum ásetir tær treytirnar sum feløgini skulu lúka fyri at kunnu verða samskattaði. Í stk. 1 er ásett, at tað eru partafeløg, smápartafeløg, smb. § 135 í smápartafelagslógini, og lutafeløg, sum eru heimahoyrandi í Føroyum, ið kunnu verða samskattaði.

Harafturat má ásetast, hvussu og nær umsókn um at verða samskattaði skal sendast til Toll- og Skattstovu Føroya. Tað er nærliggjandi at áseta, at umsóknin skal verða send í seinasta lagi samstundis sum freistin hjá feløgunum at senda sjálvuppgávuna inn, er úti.

Eisini má støða takast til, hvussu farast skal fram, um eitt av feløgunum, ið ynskja samskatting, er undir trotabúarviðgerð. Av tí at slík feløg eru undir serligum reglum, er tað ivasamt, um tað er skilagott at loyva samskatting í slíkum førum.

Ein annar spurningur er, um loyvt skal vera, at skifta millum samskatting og serskatting frá ári til árs. Tað er neyðugt at ásetta allar hesar treytirnar í eini kunngerð.

1. viðgerð 8. desember 1997. Uppskotið varð beint í fíggjarnevndina, sum 22. december 1997 legði fram soljóðandi:

Álit

Málið er lagt fram av landsstýrinum 2. desember 1997 og eftir 1. viðgerð 8. desember 1997 beint í fíggjarnevndina.

Nevndin hevur viðgjørt málið og hevur undir viðgerðini havt fund við landsstýrismannin í fíggjarmálum, Annfinn Kallsberg, saman við umboðum fyri fíggjar- og skattaumsitingina og Jógvan Arnonsson, grannskoðara.

Meirlutin (Suni Jacobsen, Eyðun Videro, Ernst Hansen, Torður Niclasen og Finnbogi Arge) tekur undir við uppskoti landsstýrisins og mælir løgtinginum til at samtykkja uppskotið.

2. viðgerð 27. december 1997. §§ 1 og 2 samtyktar 20-2-3. At uppskotið soleiðis samtykt kann fara til 3. viðgerð, samtykt 20-2-3.

Sambært § 85 í tingskipanini varð samtykt at víkja frá viðurfreistini millum 2. og 3. viðgerð 18-0-4. 3. viðgerð 30. december 1997. Uppskotið endaliga samtykt 17-8-0.
Løgtingslóg nr. 173, 30. december 1997.

F.L. j. nr. 2540-14/92

36 Uppskot til løgtingslóg um grunn fyri vakstrarhús og grønmetisframleiðslu

Ár 1997 týsdagin 2.desember, legði Ivan Johannesen, landsstýrismaður, vegna landsstýrið fram soljóðandi:

Uppskot
til

løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um grunn fyri vakstrarhús og grønmetisframleiðslu

§ 1.

Í løgtingslóg nr. 134 frá 20. august 1997 um grunn fyri vakstrarhús og grønmetisframleiðslu verður gjørd henda broyting:

1) § 6, stk. 3 verður orðað soleiðis:
"*Stk. 3.* Grannskoðaðu roknskapirnir verða sendir landsstýrismanninum við frágreiðing og viðmerkingum frá stýrinum."

§ 2.

Henda lóg fær gildi 20. august 1997.

Almennar viðmerkingar

Tá uppskot um grunn fyri vakstrarhús og grønmetisframleiðslu varð lagt fyri løgtingið í august 1997, varð § 3 orðað soleiðis:

"Stýrið grunsins er Føroya Jarðarráðið.

Stk. 2. Landsstýrismaðurin ásetir nærri reglur í kunngerð um umsiting grunsins."

§ 6 varð orðað soleiðis:

"Roknskaparár grunsins, er álmanakkaárið.

Stk. 2. Roknskapirnir sambært stk. 1 verða grannskoðaðir av løggildum grannskoðara.

Stk. 3. Grannskoðaðu roknskapirnir verða sendir landsstýrismanninum við frágreiðing og viðmerkingum frá Føroya Jarðarráðið."

Í løgtinginum varð § 3 í uppskotinum broytt til:

"Grunnurin verður fyrisitin av einum av landsstýrismanninum tilnevndum stýri við 3 limum og 3 tillukslimum. Stýrið verður valt fyri 4 ár. Stýrið skipar seg sjálvt við formanni.

Stk. 2. Landsstýrismaðurin ásetir nærri reglur í kunngerð um umsiting grunsins."

Sostatt varð orðingin í § 3, um at stýrið grunsins skuldi verða Føroya Jarðarráð burtur, og tí eigur § 6 at verða broytt samsvarandi broytingini í § 3.

Eingin fíggjarligur kostnaður stendst av uppskotinum

1. viðgerð 4. desember 1997. Uppskotið varð uttan nevndarviðgerð beint til 2. viðgerð.

2. viðgerð 15. december 1997. Uppskot landsstýrisins samtykt 25-0-0. At uppskotið soleiðis samtykt kann fara til 3. viðgerð, samtykt 25-0-0.

3. viðgerð 18. december 1997. Uppskotið, sum samtykt við 2. viðgerð, endaliga samtykt 18-0-0.

Løgtingslóg nr. 159, 19. december 1997.
F.L. j. nr. 1720-2/90

37 Uppskot til løgtingslóg um broyting í lóg um almenna forsorg og løgtingslóg um ískoytisveiting til forsorgarstuðul vegna tørvandi arbeiði

Ár 1997, týsdagin 2.desember, legði Kristian Magnussen, landsstýrismaður, vegna landsstýrið fram soljóðandi:

Uppskot
til
løgtingslóg um broyting í lóg um almenna forsorg og løgtingslóg um ískoytisveiting til forsorgarstuðul vegna tørvandi arbeiði

§ 1.

Henda lóg er givin út sambært "Lov nr. 315 af 17. maj 1995 om sociale ydelser på Færøerne".

§ 2.

Í lóg nr. 56 frá 15. mars 1967 fyri Føroyar um almenna forsorg smb. lógarkunngerð nr. 100 frá 02.03.1988 um almenna forsorg, sum seinast broytt við lóg nr. 76 frá 23. mai 1997, verða gjørdar hesar broytingar:

1) Í § 9, stk. 1 verður aftaná "ophør af samlivet med ægtefælle" sett: "væntandi arbeiðsmøguleikar".
2) Í § 9, stk. 2 verður sum 4. pkt. sett: "Tó kann samlaði stuðulin, ið verður útgoldin persónum í samband við væntandi arbeiðsmøguleikar, ikki verða hægri enn hægsta útgjaldið frá ALS og um viðkomandi ikki hevur aðrar inntøkur."
3) Í § 9 verður stk. 3 tikið av, og stk. 4 verður stk. 3, og í stk. 3, seinastu reglu, verða orðini "og stk. 3" strikaði.
4) Sum nýtt § 15, stk. 3 verður sett:

"*Stk. 3.* Hevur persónur, ávístur av lækna, fingið uppihald á eftirhaldsheimi, kann fíggjarligur stuðul verða veittur."

5) Í § 18, stk. 5, 1. pkt. verður aftaná orðini "ydes støtte til" sett: "heilivág".
6) Í § 18, stk. 6 verður aftaná síðsta pkt. sett: "Íroknað reglur um egingjald og nær stuðul til hjálpitól kann veitast sum lán."
7) Aftaná § 18 verður sett:

"**§ 18a.** Játtast kunnu vard støðv.vinnuroyndir, umskúling v.m. til avlatnin og onnur, sum av einhvørji orsøk eru verðin avmarkað í sínum vinnuførleika. Lønarfskoytið til vardu støðvini kann veitast."

§ 3.

Løgtingslóg nr. 72 frá 10. mai 1994 um ískoytisveiting til forsorgarstuðul vegna tørvandi arbeiði verður tikin av.

§ 4.

Henda lóg kemur í gildi 1. januar 1998.

Viðmerkingar
Broytingarnar í hesum uppskoti eru innihaldsligar og av tekniskum slagi.

Broytingarnar í § 9 eru innihaldsligar, meðan broytingarnar í §§ 15 og 18 og 18a eru av tekniskum slagi fyri at gera galdandi lóg greidligari. Víst verður annars til serligu viðmerkingarnar um, hvussu og av hvørjari orsøk broytingarnar verða gjørdar.

Viðmerkingar til einstøku greinirnar
Ad. § 2, nr. 1) Viðv. § 9:
Endamálið við broytingunum í § 9 er at fáa lógina um forsorg vegna arbeiðsloysi broytta soleiðis, at vent verður aftur til tað, ið var galdandi fram til 1. august 1992, at øll, ið av ymiskum orsøkum søkja um fíggjarligan stuðul eftir § 9 í forsorgarlógini, skulu viðgerast eins, tó við tí undantaki, at veitingin, ið ein kann fáa vegna arbeiðsloysi, ikki kann verða størri enn tað ein í mesta lagi kann fáa útgoldið frá ALS.

Orsøkin til at lógin bleiv broytt í 1992 var, at forsorgarstuðul ikki skuldi kunna kappast við Arbeiðsloysistryggingina, ið tá ætlandi skuldi vera ein sjálvboðin skipan við lægri útgjaldi enn tað ein kundi fáa í forsorg.

Tá ALS tó bleiv ein tvungin skipan, var ongin orsøk at broyta forsorgarlógina. Hetta bleiv tó gjørt, og hevur henda broyting í forsorgarlógini ført við sær, at fólk, ið fáa fíggjarligan stuðul vegna arbeiðsloysi verða øðrvísi viðgjørd, enn fólk ið fáa fíggjarligan stuðul annars. Hetta hevur við øðrum orðum ført við sær, at meðan fólk, ið fáa stuðul vegna sjúku, barnsburð samlívsslit o.a. fáa eina veiting, ið er mett í mun til fíggjarliga tørvin, so fáa fólk, ið fáa stuðul vegna arbeiðsloysi, sama stuðul, líkamikið um tey hava útreiðslur ella ikki.

Á vári 1994 samtykti løgtingið broyting í forsorgarlógini, ið gjørdi lógina enn meiri fløkjusliga, við tað at samtykt bleiv at forsyrgjarar kundu fáa upphædd, sum í mesta lagi svarar teimum 125% av upphædd svarandi til fólkapensiónina, við ískoyti fyri hvørt barni undir 18 ár, svarandi til barnaviðbót eftir "Lov for Færøerne om folkepension", um viðkomandi ikki hevði rætt til barnagjald.

Fyri at fáa rættatrygdina hjá borgarunum betri og fyri at borgarar, ið eru avskornir frá at tjena til egi uppihald skulu hava somu søndir, við undantaki fyri ásetingina í § 9, stk.2 í lógaruppskotinum, verða hesar broytingar lagdar fyri løgtingið.

Ad § 2, nr. 2): Útgjaldsupphæddin kann í mesta lagi vera svarandi til hægsta útgjald frá Arbeiðsloysisskipanini.

Ad § 2, nr. 3): Við broytingini í § 9, stk. 1, dettur so § 9, stk. 3 burtur, tí tað var hetta stk. sum ásetti, at tey sum vóru í forsorg vegna arbeiðsloysið, bert skuldu fáa eina trongdarveiting. Av hesi orsøk verður núverandi stk. 4 nýtt stk. 3, og í nýggja stk. 3.

Væntast kann, at hesar broytingar hava nakað av meirútreiðslum við sær, sum tó halda seg innanfyri karmarnar í fíggarlógaruppskotinum fyri 1998.

Ad. § 2, nr. 4) *Viðv. § 15, stk. 3:*
Samhært § 11 í forsorgarlógini frá 1977 var heimild til at gjalda uppihaldsútreiðslur fyri fólk á eftirbataheimi (Hvíldarheimið Naina), hendan heimild varð broytt í 1983, smb. § 15, stk. 2 í forsorgarlógini. Samhært hesi grein, skal ein tørvsmeting gerast av fíggjarligu støðuni hjá teimum fólkum, sum søkja um stuðul til sjúkuviðgerð, medisin, tannviðgerð o.l. (Eftirbataheim koma undir o.l.). Almannastovan ger tørvsmetingar í øllum hesum førum, men Almannastovan hevur tó ongantíð gjørt hesa tørvsmeting, tá ið tað snýr seg um umsókn til stuðul til uppihald á eftirbataheimi. Tørvsmetingin kann viðføra, at fleiri av teimum sum hava tørv at koma á eftirbataheimið ikki fáa møguleika til tess, av tí at tað verður ov kostnaðarmikið fyri tey. Hetta hevur allarhelst ikki verið ætlanin við lógarbroytingini í 1983. Uppihaldið á eftirbataheiminum er at meta sum ein

eftirviðgerð vegna sjúku. Um omanfyri nevndu ikki fingu goldið uppihald á eftirbataheimi, kundi hugsast at tey fingu eitt longri uppihald á sjúkrahúsinum, og uppihaldið á sjúkrahúsinum er væl dýrari enn uppihaldið á eftirbataheiminum.

Broytingin í hesari grein verður sostatt gjørd fyri at fáa greiðari lógarheimild fyri verandi umsiting á Almannaslovuni av stuðli til fólk, ið fara á eftirbataheim.

Eingin fíggjarligur kostnaður stendst av broytingini.

Ad. § 2, nr. 5) ***Viðv. § 18, stk. 5, 1. setning:***
Ein neyvari orðing av greinini, so heilivágur verður beinleiðis nevndur. Mett verður skilabest at seta hetta beinleiðis inn í lógina, serstakliga nú ein kunngerð um heilivág verður sett í gildi, og sum ásetur egingjald í mun til veittan heilivág.

Væntast kann ein sparing á hesum øki, sum er innroknað í fíggjarlógaruppskotinum fyri 1998.

Ad. § 2, nr. 6): Hetta er eisini ein neyvari orðing, har heimildin til at áseta egingjald og at stuðul til hjálpitól kann veitast sum lán, beinleiðis verður nevnd.

Ad. § 2, nr. 7) ***Viðv. § 18, stk. a:***
Henda broyting hevur til endamáls aftur at fáa lógarheimild til játtan av vardum støvrum.

Frá 1988 til medio 1993 vóru hesi støvr játtað eftir § 18 í forsorgarlógini, tá henda heimild varð flutt frá Færøernes Ulykkesforsikringsråd til Almannastovuna. Men í 1993, í samband við grannskoðanarfrágreiðingarnar, bleiv ivi settur um hesa heimild, og uppá fyrispurning metti Socialministeriet, at heimildin var dottin burtur. Síðan medio 1993 eru ongi vard støvr játtað.

Hetta er ógvuliga óheppi, tí grundhugsanin við vardum støvrum er nevniliga at fáa tey, sum koma í hendа bólkin, virknan aftur í samfelagslívinum. Ístaðin fyri at verða óvirkin og bert taka ímóti eini veiting, skulu tey aktiverast út frá egnum og samfelagsligum møguleikum.

Viðvíkjandi lønarískoytinum so kann sigast, at eftir tí skipanini sum var galdandi, so rindaði Almannastovan 40% av lønarútreiðslunum og arbeiðsgevarin 60%. Smb. uppskotinum kann landsstýrið við kunngerð áseta lønarískoytið. Nevnast kann her, at fyri somu støvr í Danmark er lønarískoytið 50%.

Tað er torført at meta um fíggjarligu avleiðingarnar av hesi broyting, men roknað verður tó við, at broytingin ikki førur við sær meirkostnað.

Að § 2, nr. 8) Viðv. løgtingslóg um uppískoytisveiting:
Løgtingslóg nr. 72 frá 10. mai 1994 um uppískoytisveiting til forsorgarstuðul vegna tørvandi arbeiði, dettur burtur, um lógarbroytingin í § 9 í forsorgarlógini verður samtykt. Nú er ongin orsøk at hava hesa lóg galdandi, tí øll tey sum eru á forsorg vegna arbeiðsloysi, fáa nú stuðul eftir eini tørvsmeting.

Að § 3. Gildiskoma:
Lógin skal koma í gildi 1. januar 1998.

Í viðgerð 4. desember 1997. Uppskotið verður beint í tríggjaðarnevndina, sum tann 19. desember 1997 legði fram soljóðandi:

Álit

Málið er lagt fram av landsstýrinum 28. november 1997 og eftir 1. viðgerð 4. december 1997 beint í trivnaðarnevndina.

Nevndin hevur viðgjørt málið á fundi 18. december 1997.

Undir viðgerðini var Kristian Magnussen, landsstýrismaður, á fundi við nevndini saman við Bjarna Vilhelm, almannastjóra. Landsstýrismaðurin og almannastjórin greiddu nevndini nærri frá málinum og svaraðu spurningum frá nevndarlimunum.

Ein samd nevnd mælir tinginum til at samtykkja uppskot landsstýrisins.

2. viðgerð 27. december 1997. Uppskotið samtykt 30-0-0. At uppskotið soleiðis samtykt kann fara til 3. viðgerð, samtykt 30-0-0 .

Sambært § 85 í tingskipanini varð samtykt at víkja frá tíðarfreistini millum 2. og 3. viðgerð 18-0-4.

3. viðgerð 30. december 1997. Uppskotið, sum samtykt við 2. viðgerð, endaliga samtykt 24-0-0

Løgtingslóg nr. 177, 30. december 1997.
F.L. j. nr. 1015-25/94

38 Uppskot til løgtingslóg um broyting í lóg um barnaforsorg

Ár 1997, týsdagin 2.desember, legði Kristian Magnussen,landsstýrismaður, vegna landsstýrið fram soljóðandi:

Uppskot
um
løgtingslóg um broyting í lóg um barnaforsorg

§ 1.

Henda lóg er givin út sambært " Lov nr. 315 af 17.maj 1995 om sociale ydelser på Færøerne "

§ 2.

Í lógarkunngerð nr. 104 frá 02.03.1988 um barnaforsorg, sum seinast broytt við § 8 í lóg nr. 393 frá 22.06.1993, verður sum § 44 sett:

"**§ 44.** Hóast ásetingina í § 43, stk. 1 verða í tíðarskeiðnum 1. januar 1998 til 31. desember 1999 útreiðslurnar býttar soleiðis, at foreldrini at børnunum rinda 30%, avvarandi kommunu 35% og landið 35%."

§ 3.

Henda lóg kemur í gildi 1. januar 1998.

Almennar viðmerkingar

Tað er eitt alsamt vaksandi ynski hjá kommunum at fáa økt talið av barnaansingarplássum. Landið hevur ikki í sama mun møguleika at víðka útreiðslurnar ið standast av hesum. Fyri at kunna nøkta tørvin, er tí neyðugt, at útreiðslubýtið ímillum land og kommunur verður broytt soleiðis, at kommunuparturin hækkar frá 30% til 35% og landskassaparturin lækkar tilsvarandi.

Hetta býtið verður at galda í tvey ár frá 1. januar 1998 til 31. desember 1999. Kommununevndin sum skal gera uppskot um nýggja kommunala skipan í Føroyum, skuldi tá verið liðug við álit sítt, og sum viðari skipanin skal byggja á.

Á várið 1997 játtaði løgtingið kr. 1.581.000 eyka fyri at nøkta bráfeingistørvin á økta talinum av barnaansingarplássum. Henda eykajáttan varð nýtt til nýggja dagrøktarskipan í Haldórsvíkar, Leirvíkar og Porkeris kommunu, uppnormering av dagrøktarskipan í Vágs og Runavíkar kommunu, framhaldandi virksemi av skúlabarnaansingini og royndarvirksemi við útiharnagarði í Tórshavnar kommunu. Viðmerkjast skal eisini, at upprunajáttanin var kr. 49.028.000. Í viðmerkingunum til lógaruppskotið varð greint frá, at eykajáttanin ikki lógr at føra við sær meirútreiðslur í 1998, tí landsstýrismaðurin fór at leggja uppskot fyri tingið, um broyting í útreiðslubýtinum millum land og kommunu.

Kommunurnar hava í sínum ummæli av lógaruppskotinum mótmælt, at landsstýrið áleggur teimum størri fíggjarligar byrðar. Verður lógin sett í gildi, hava kommunurnar mælt til, at broytingin bert verður galdandi í tvey ár, vísandi til at kommununevndin tá verður liðug við arbeiði sítt.

Verður uppskotið samtykt, má landsstýrið loyva kommununum at bera (fíggja) tær øktu útreiðslurnar av hesum nýggja býti.

Meirkostnaðurin fyri kommunurnar verður kr. 5.063.315, sum partvíst verður brúktur til fleiri ansingarpláss.

Serligar viðmerkingar
Ad. § 1: Henda lóg er givin út sambært "Lov nr. 315 af 17. maj 1995 om sociale ydelser på Færøerne".

Ad. § 2: Hendla grein staðfestir, at frá 1. januar 1998 og til 31. desember 1999 verður útreiðsluhýtið av barnaansingini hendan: foreldrini at børnunum rinda 30%, avvarandi kommuna rindar 35% og landið rindar 35%.

Kommununevndin skuldi tá verið liðug við álit sítt, sum viðari skipanin skal byggja á.

Ad. § 3: Henda lóg kemur í gildi 1. januar 1998.

Í viðgerð 4. desember 1997. Uppskotið varð beint í trivnaðarnevndina, sum tann 19. december 1997 legði fram soljóðandi:

Álit

Málið er lagt fram av landsstýrinum 28. november 1997 og eftir 1. viðgerð 4. desember 1997 beint í trivnaðarnevndina.

Nevndin hevur viðgjørt málið á fundi 18. desember 1997.

Undir viðgerðini var Kristian Magnussen, landsstýrismaður, á fundi við nevndini saman við Bjarna Vilhelm, almannastjóra. M.a. greiddi landsstýrismaðurin frá, at barnaansing í løtuni er í 25 kommunum, og at 8 kommunur hava ætlan um at skipa fyri (ella víðka) barnaansing í næstu framtíð. Landsstýrismaðurin gjørdi vart við, at skal landsstýrið luttaka í útreiðslunum til tey nýggju ansingarplássini, verður neyðugt at broyta procentvísa býtið millum land og kommunur soleiðis, at landskassin fær 5 milliónir meira at ráða yvir.

Undir viðgerðini hevur nevndin býtt seg í ein meirluta og tveir minnilutar.

Meirlutin (Vilhelm Johannesen, Henrik Old, Ingeborg Vinther og Jents av Rana) tekur ikki undir við uppskotinum, og mælir frá at samtykkja tað.

Ein minniluti (Maria Hansen og Rúna Sivertsen) **mælir** tinginum til at samtykkja uppskotið, hóast hetta er óheppið fyri kommununar í hesum sparitíðum, tí at uppskotið gevur møguleika fyri at økja um talið av nógv eftirspurdum barnaansingarplássum.

Ein annar minniluti (Lasse Klein) tekur undir við uppskotinum við hesum viðmerkingum:

Lasse Klein søknast eftir einum fløkiligum barnaansingarpolitikki, sum í størri mun tekur hæld fyri, at familjan sjálv velur, hvussu hon ynskir at fremja umsorgan fyri barninum, og eftirlýsir størri rættvísi frá almennari síðu, sum gevur sama rætt til stuðul til barnið, annaðhvørt tað verður passað heima ella í vøggustovu/barnagarði.

Talan er um tveir arbeiðsmarknaðir, heimið og stovnarnar, og tað ber ikki til framhaldandi at góðtaka, at hesir báðir arbeiðsmarknaðir ikki verða javnsettir, og er hetta orsøkin til, at heitt verður á landsstýrismannin um at arbeiða fyri størri rættvísi á ansingarøkinum fyri børn.

Talan er í hesum uppskotinum um eina bráðfeingis loysn, og er hetta orsøkin til, at Kristiligi Fólkaflokkurin kann taka undir við uppskotinum. Eisini tí, at talan er um eitt avmarkað tíðarskeið, bæði fyri kommunur, sum eru nevndar í uppskotinum, og fyri tær 8 kommununar, sum sambært landsstýrismanninum bráðfeingis kunnu fáa stuðul til barnaansing, um so er, at uppskotið verður samtykt.

2.viðgerð 22. december 1997. Uppskotið samtykt 16-3-9. At uppskotið soleiðis samtykt kann fara til 3. viðgerð,samtykt 19-4-6.

3. viðgerð 27. december 1997.Uppskotið, sum samtykt við 2. viðgerð, endaliga samtykt 22-2-5.

Løgtingslóg nr. 163, 29. december 1997.
F.L. j. nr. 1015-13/91

39 Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um Føroya Lívstrygging

Ár 1997 týsdagin 2.desember legði Ivan Johannesen, landsstýrismaður, vegna landsstýrið fram soljóðandi:

Uppskot
til
løgtingslóg um broyting av løgtingslóg um Føroya Lívstrygging

§ 1.

Í løgtingslóg nr. 77 frá 23. mei 1997 fyri Føroya Lívstrygging við seinni broytingum, verða gjørdar hesar broytingar:

1) Í § 1, stk. 2 verður "1. januar 1998" broytt til: "1. januar 1999".
2) § 4, stk. 1 verður orðað soleiðis:
"Landsstýrið kann stovna lívstryggingarpartafelag, selja ella avhenda tryggingarmongdina í Føroya Lívstrygging til annað felag."
3) Í § 7 verður "1. januar 1998" broytt til: "1. januar 1999".

§ 2.

Henda lóg kemur í gildi dagin eftir, at hon kunngjørd.

Almennar viðmerkingar

Við løgtingslóg nr. 77 frá 23. mai 1997 samtykti Føroya Løgting nýggja lóg fyri Føroya Lívstrygging. Lógin

kemur í gildi 1. januar 1998, og tá fer galdandi løgtingslóg nr. 64 frá 10. oktober 1966 um lívstryggingarvirksemi úr gildi.

Lógin ásetur, at aftaná ígildiskomuna heldur landskassaábyrgdin uppat, tó ikki fyri galdandi tryggingaravtalur. Nýggjar tryggingar kunnu ikki teknast í Føroya Lívstrygging.

Landsstýrinum verður heimilað at gera avtalur við onnur lívstryggingarfeløg um leiðslu av Føroya Lívstrygging. Eisini kann landsstýrið selja ella avhenda tryggingarmongdina í Føroya Lívstrygging til annað felag.

Nevndin, sum arbeiddi við tryggingarviðurskiftum, gjørdi uppskot til nevndu lóg, og mælti frá at umskipa Føroya Lívstrygging til eitt partafelag. Frámælið varð grundað á ivaspurningar viðvíkjandi útlutan av vinningsbýti, sum vóru reistir í rættarmálinum viðvíkjandi søluni av Statsanstalten for Livsforsikring.

Ístaðin mælti nevndin til, at tær tryggingaravtalur, sum vóru í Føroya Lívstrygging, tá ið lógin fór at koma í gildi, hildu fram - við landskassaábyrgd - og stovnurin sostatt helt fram at virka, so leingi virknar tryggingaravtalur vóru eftir í stovninum.

Nú ivi hevur stungið seg upp um rættarligu støðuna hjá Føroya Lívstrygging, hevur Vinnumálastýrið viðgjørt spurningin og er komið til ta niðurstøðu, at orsøk er til at halda, at Føroya Lívstrygging er partur av almennu fyrisitingini sum eitt serligt fyrisitingarsubjekt, og tí er ogn hjá Føroya Landsstýri. Tískil er neyðugt at útseta ígildiskomuna av lógini, soleiðis at hesin spurningur kann kannast til fulnar.

Løgtingslóg nr. 77 frá 23. mei 1997 heimilar landsstýrinum at selja ella avhenda tryggingarmongdina í Føroya Lívstrygging, men heimild er ikki at umskipa Føroya Lívstrygging til partafelag.

Lógarbroytingin, sum verður uppskotin, gevur landsstýrismanninum møguleika fyri, umframt at selja ella avhenda tryggingarmongdina í Føroya Lívstrygging, at umskipað Føroya Lívstrygging til partafelag.

Viðmerkingar til tær einstøku greinarnar:
Til §1, nr. 1:
Neyðugt er at leingja freistina frá 1. januar 1998 til 1. januar 1999. Lívstryggingarfeløg skulu lúka ásetingarnar í kap 3 í løgtingslóg nr. 3 frá 11. februar 1996 um tryggingarvirksemi. Henda mannagongd er tíðarkrevjandi, og nú ávísur ivi er um løgfrøðisliga grundarlagið fyri Føroya Lívstryggin, er tíðarkarmurin fram til 1. januar 1998 ov trongur.

Til § 1, nr. 2.:
Ásetingin gevur landsstýrismanninum møguleika fyri at umskipa Føroya Lívstrygging til partafelag, um tað verður mett at vera besta loysnin. Slíkt uppskot varð lagt fram í 1994, men orsaka av nývali, datt tað burtur.

Landsstýrismaðurin í tryggingarmálum hevur skyldu at tryggja núverandi virði í landskassanum, og tí er neyðugt at landsstýrismaðurin fær tær bestu fortreytir fyri at røkja sítt málsøki.

1. viðgerð 4. desember 1997. Uppskotið varð beint í vinnunevndina, sum 8. desember 1997 legði fram soljóðandi:

Álit

Málið er lagt fram av landsstýrinum tann 2. december 1997 og eftir 1. viðgerð tann 4. december 1997 beint í vinnunevndina.

Vinnunevndin hevur viðgjørt málið og hevur undir viðgerðini havt fund við Jens Petur Arge og Tummas Eliassen frá Føroya Lívstrygging og frá Tryggingarsambandið Føroyar. Jens Petur Arge hevur hartumframt verið við í nevndini, sum gjørdi uppskot til løgtingslóg fyri Føroya Lívstrygging.

Umboðini fyri Føroya Lívstrygging søgdu, at partafelag var stovnað til at føra virksemið hjá Føroya Lívstrygging víðari, og ætlanin var, at hetta partafelag skuldi koma at virka frá 1. januar 1998. Nú er Vinnumálastýrið komið eftir, at orsøk er til at halda, at Føroya Lívstrygging er partur av almennu fyrisitingini sum eitt serligt fyrisitingarsubjekt og tí er ogn hjá Føroya Landsstýri. Umboðini fyri Føroya Livstrygging meta hareftirmóti, at talan er um ein sjálvsognarstovn, sum tryggingartakararnir eiga. Arbeiðið við at fyrireika partafelagið til at byrja 1. januar er av hesum fyribils steðgað, meðan greiða fæst á hesum spurningi.

Vinnunevndin er samd um at leingja lógini í eitt ár til 1. januar 1999, men vinnunevndin vil samstundis beita á landsstýrið um at fáa henda spurning loystan sum skjótast.

Ein samd nevnd mælir við besum viðmerkingum løgtinginum til at samtykkja uppskot landsstýrisins.

2. viðgerð tann 15. december 1997. Uppskot landsstýrisins samtykt 24-0-0. At uppskotið soleiðis samtykt kann fara til 3 viðgerð, samtykt 25-0-0.

3. viðgerð 18. desember 1997. Uppskotið, sum samtykt við 2. viðgerð, endaliga samtykt 21-0-0.
Løgtingslóg nr. 157. 19. december 1997.
F.L. j. nr. 617-28/94

40 Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um lívstryggingarvirki

Ár 1997, týsdagin 2.desember, legði Ivan Johannesen, landsstýrismaður, vegna landsstýrið fram soljóðandi:

Uppskot
til
løgtingslóg um broyting av løgtingslóg um lívstryggingarvirki

§ 1.

Í løgtingslóg nr. 64 frá 10. oktober 1966 um lívstryggingarvirki við seinni broytingum, verða gjørdar hesar broytingar:

1) § 4, stk. 1. verður orðað soleiðis:
"Lívstryggingarstovnurin verður stjórnaður av eini nevnd. Í nevndini vera 5 limir, sum landsstýrismaðurin velur. Nevndin setur stjóra."

§ 2.

Henda lóg kemur í gildi dagin eftir, at hon kunngjørd.

Stk. 2. Samstundis verður tann danski teksturin í lógini strikaður.

Almennar viðmerkingar

Í løgtingslóg nr. 64 frá 10. oktober 1966 er ásett, at virki hjá Føroya Lívstrygging verður stjórnað av stýrinum fyri Tryggingarsambandið Føroyar, og at stjóri tryggingarsambandsins hevur sum forrættingsførari dagligu leiðsluna av stovninum.

Sambært løgtingslóg um trygging, velur landsstýrið 4 av 5 limum í nevndina fyri Tryggingarsambandið Føroyar, sum samstundis er nevnd fyri Føroya Lívstrygging. 5. limurin verður valdur av umboðsráðnum.

Broytingin inniber, at nú verður tað landsstýrismaðurin, sum fer at velja allar 5 limirnar.

Orsøkin til uppskotnu broyting er, at sambært løgtingslóg um tryggingarvirksemi kann lívstryggingarvirksemi ikki í sama felag verða saman við øðrum tryggingarvirksemi.

Harnæst er Tryggingarsambandið Føroyar undir umskipan, og framyvir kemur landsstýrismaðurin ikki at velja nevndina. Í staðin verður tað tryggingartakarumir, sum koma at velja hesa.

Tí ber ikki til framyvir at nýta somu nevnd ella leiðslu.

1. viðgerð 4. desember 1997. Uppskotið verður beint í vinnunevndina, sum 8. desember 1997 legði fram soljóðandi:

Álit

Málið er lagt fram av landsstýrinum tann 2. desember 1997 og er eftir 1. viðgerð tann 4. desember 1997 beint í vinnunevndina.

Vinnunevndin hevur viðgjørt málið og hevur undir viðgerðini havt fund við Jens Petur Arge og Tummas Eliassen frá Føroya Lívstrygging og Tryggingarsambandinum Føroyar.

Hin samd nevnd mælir løgtinginum til at samtykkja uppskot landsstýrisins.

2.viðgerð 15. december 1997. Uppskot landsstýrisins samtykt 26-0-0. At uppskotið soleiðis samtykt kann fara til 3. viðgerð, samtykt 26-0-0.

3. viðgerð 18. december 1997. Uppskotið, sum samtykt við 2. viðgerð, endaligt samtykt 21-0-0.

Løgtingslóg nr. 158, 19. december 1997.
F.L. j. nr. 617-28/94

41 Uppskot til løgtingslóg um mánaðarligan minstaforvinning til útróðrarmenn

Ár 1997, týsdagin 2.desember, legði John Petersen, landsstýrismaður, vegna landsstýrið fram soljóðandi:

Uppskot
til
løgtingslóg um mánaðarligan minstaforvinning til útróðrarmenn

§ 1. Við tí endamáli at tryggja inntøkur útróðrarmanna, verður úr landskassanum latin mánaðarligur minstaforvinningur til manning, sum er heimahoyrandi í Føroyum, ella sum sambært sáttmála við onnur lond kann koma undir skipanina, og sum vinna á føroyskt skrásettum fiskiførum á útróðri á føroysku landleiðunum.

§ 2. Útróðrarmaður hevur rætt til mánaðarligan minstaforvinning, um so er, at fiskifarið hevur avreitt í minsta lagi fyri í miðal kr. 10.000, fyri hvønn mannin, fyri hvønn mánaða teir seinastu 6 mánaðarnar frammanundan.

Stk. 2. Hesar reglur eru galdandi fyri tal av manning, sum í mesta lagi hava rætt til minstaforvinning: Fiskifør undir 10 Brt. 3 menn, millum 10 og 15 Brt. 4 menn, millum 15 og 20 Brt. 5 menn. Av hesum kunnu 2 vera eigarar á landi.
Stk. 3. Um so er, at treytirnar í § 2, stk. 1 ikki eru loknar vegna serligar umstøður so sum brek á ella úskiftan av fiskifari, longri sjúkralegu v.m. kann frávik gerast, tó hægst 2 ferðir í einum almanakkaári. Frávik verður bert loyvt, um neyðugt prógvtilfar fyriliggur.

§ 3. Um manning á fiskifari skal koma undir skipan-

ina við mánaðarligum minstaforvinningi, skal bátsformaðurin fyri hvønn mánaða lata Lønjavningargrunninum skrivligta fráboðan. Tilmeldingin við lista yvir manningina skal vera Lønjavningargrunninum í hendi, undirskrivað av manning og bátsformanni, í seinasta lagi fyrsta arbeiðsdag í mánaðinum, um ætlanin er at koma undir skipanina.
Stk. 2. Um avloysari ella nýggjur maður kemur við á fiskifar fyri annan mann, ella um maður fer av fiskifarinum, fráboðar bátsformaðurin skrivliga hesar broytingar til Lønjavningargrunnin beinanvegin. Í mánaðaruppgerðini skal greitt framganga, hvør hevur verið við hvønn dag.
Stk. 3. Manning á fiskifari, ið kemur undir skipanina við mánaðarligum minstaforvinningi, kann ikki í sama tíðarskeiði koma undir aðra inntøkutrygdarskipan.

§ 4. Mánaðarligur minstiforvinningur til útróðrarmenn er kr. 7.500,00 um mánaðin. Minstiforvinningurin verður minkaður við kr. 5,- fyri hvørjar kr. 10,- , ið útróðrarmaður samhært skattavaldinum hevur fingið útgoldið í inntøku, fiskipartur froknaður, uttan mun til nær inntøkan er forvunnin í mánaðinum, sum minstiforvinningurin verður útgoldin fyri.

Stk. 2. Fiskipartur verður eftir hesi skipan roknaður sum 42% av bruttoavreiðingarvirðinum, býtt við manningartalinum. Frítíðarløn verður ikki goldin av minstaforvinningi.

§ 5. Mánaðarligur minstiforvinningur verður avroknaður aftaná 15. í mánaðinum eftir, at hann er vunnin, ella so skjótt mánaðaruppgerðin er innkomin eftir hesa freist.

§ 6. Skipanin við mánaðarligum minstaforvinningi verður umsitin av Lønjavningargrunninum.
Stk. 2. Heimilað verður landsstýrismanninum í fiskivinnumálum at áseta í kunngerð nærri reglur um mannagongdir v.m. til tess at útinna hesa lóg.
§ 7. Lønjavningargrunninum verður heimilað at útvega neyðugar upplýsingar til fyrisiting av stuðlinum, og avvarðandi stovnar og vinnufeløg/fólk hava skyldu at lata neyðugt prógvtilfar í sambandi við útintingina av hesum stuðulsreglum.
§ 8. Henda lóg kemur í gildi 1. januar 1998. Samstundis fer úr gildi løgtingslóg nr. 81 frá 28. mai 1996 um mánaðarligan minstaforvinning til skrásettar útróðrarmenn.

Almennar viðmerkingar
Síðani skipanin við mánaðarligum minstaforvinningi kom í gildi 1. juni 1996. er inntøkutrygdin til útróðrarfør undir 15 BRT tvífaldað í sama tíðarskeiði sum inntøkutrygdin minkaði til restina av feskfiskaflotanum.Samlaðu útgjaldingarnar av mánaðarligum minstaforvinningi í tíðarskeiðinum 1. september 1996 til 31. august 1997 vóru 32, 3 mió kr. Hetta í einum tíðarskeiði, har toskafiskiskapurin hevur verið framúr góður. Vandi er tí fyri, at tá fiskiskapurin minkar, verður skipanin uppaftur dýrari.

Vøksturin í minstaforvinninginum liggur í sjálvari skipanini við mánaðarligum minstaforvinningi.

Landsstýrismaðurin er tí av teirri fatan, at neyðugt verður at broyta skipanina, soleiðis sum skotið er upp. Hetta hevur við sær, at tuplari verður at koma undir skipanina, men skipanin kemur at virka sum verulig inntøkutrygd fyri mistur útróðrardagar. Mánaðarliga útgjaldið fyri landskassan verður munandi minni.

Í tíðarskeiðinum frá 1. juni 1995 - 31. mai 1996 og frá 1. juni 1996 - 31. mai 1997 minkaði minstaløn og dagstudningur úr 72,1 mill. kr. niður í 48.5 mill. kr., sum er ein minking uppá 23,6 mill. kr.

Í sama tíðarskeiðið vaks minstiforvinningurin úr 15,4 mill. kr upp í 29,2 mill kr., sum er ein vøkstur uppá 13,8 mill. kr.

TALVA 1: inntøkutrygd býtt á bólkar 1. juni 1995 - 31. mai 1996 og 1. juni 1996 - 31. mai 1997

	1/6 95 - 31/5 96	1/6 96 - 31/5 97	munur	munur í %
Lemmatrolarar	4.259.458	3.768.894	-490.564	-12%
Partrolarar	6.821.374	4.046.622	-2.774.753	-41%
Línuskip	13.552.624	4.680.118	-8.872.506	-65%
Útróðrarbátar y 15 BRT	29.455.583	26.970.629	-2.484.954	-8%
Útróðrarbátar u 15 BRT	10.526.293	21.280.830	10.754.537	102%
Ídnaðartr. & garnaskip	4.839.090	2.741.098	-2.097.992	-43%
Nótaskip & uppisjóartr.	5.953.935	5.997.842	43.907	1%
Flakatrolarar	2.201.002	695.795	-1.505.207	-68%
Rækjutrolarar	3.269.717	5.539.146	2.269.429	69%
Onnur fiskifør	6.652.967	1.995.114	-4.657.853	-70%
	87.532.042	77.716.088	-9.815.954	-11%

Talva 1 vísir minking í inntøkutrygdini hjá fiskiskaflotanum, undantikið útróðrarbátar undir 15 BRT. Viðmerkjast skal, at av teimum umleið 24 mill. kr., sum minstaløn, dagstudningur og frítíðarløn er minkað við, eru umleið 6 mill. kr. orsakað av skipum, sum farin eru úr flotanum, og skip, sum ikki vóru í vinnu alt seinna 12 mánaðar skeiðið.

Hesin vøkstur í inntøkutrygdini til útróðrarflotan hendi, hóast virðið á veiðuni vaks munandi.

Talva 2 vísir broytingarnar í virðinum á veiðuni hjá fiskiskaflotanum.

TALVA 2: virðið á veiðuni býtt á bólkar 1. juni 1995 - 31. mai 1996 og 1. juni 1996 - 31. mai 1997

	1/6 95 - 31/5 96	1/6 96 - 31/5 97	munur	munur í %
Lemmatrolarar	125.387.761	125.370.737	-17.023	0,0%
Partrolarar	162.705.053	197.775.711	35.070.658	21,6%
Línuskip	116.276.993	158.488.657	42.211.664	36,3%
Útróðrarbátar y 15 BRT	108.130.679	126.651.300	18.520.621	17,1%
Útróðrarbátar u 15 BRT	50.830.516	77.733.783	26.903.267	52,9%
Talt:	563.331.001	686.020.188	122.689.187	21,8%

Talvan vísir, at útróðrarbátarnir undir 15 BRT, lutfallsliga hevdu størstu økingina í virðinum á veiðuni. Tað er sostatt ikki vánaligur fiskiskapur, sum er orsøkin til stóra vøksturin í inntøkutrygdini hjá hesum bólki.

Talva 3 vísir bátatal, manningartal og persónar sum vóru undir inntøkutrygd í bólki 5, útróðrarbátar undir 15 BRT., fyri tíðarskeiðini frá 1. juni 1995 - 31. mai 1996 og frá 1. juni 1996 - 31. mai 1997. "Manningartal" vísir miðaltalið av monnum ávisti mánaðirnar bátarnir vóru undir minstalønarvinningi, meðan "persónar" vísir talið av persónum sum vóru skrásettir við bátum í bólkinum, skiftandi frá monnum, sum vórtr ein túr, til menn, sum vóru við allar túrarnar.

TALVA 3: bátatal, manningartal v.m. í bólki 5 fyri tíðarskeiðini frá 1. juni 1995 - 31. mai 1996 og frá 1. juni 1996 - 31. mai 1997

	1/6 95 - 31/5 96	1/6 96 - 31/5 97	munur	munur í %
Bátar	292	251	-41	-14%
Manningartal	462,7	451,0	-11,7	-3%
Manningartal pr. bát	1,58	1,80	0,21	13%
Persónar	823	638	-185	-22%
Inntøkutrygd pr. bát	36.049	84.784	48.735	135%
Inntøkutrygd pr.mann	22.751	47.187	24.436	107%
Inntøkutrygd pr. persón	12.790	33.356	20.565	161%

Talva 3 vísir, at talið av bátum og monnum, sum komu undir minstaforvinning er minkað. Miðal mannin artalið pr. bát er tó vaksið við 13%, sum tó í ongan mun stendur mát við vøksturin í inntøkutrygdini fyri bólkin uppá 102%, tó at virðið á veiðuni vaks við einum stórum triðingi (sí Talva 2).

Talva 4 vísir inntøkutrygdina í % av virði fyri útróðrarbátar undir 15 BRT., fyri tíðarskeiðið frá 1. juni 1996 - 31. mai 1997. Talvan vísir m.a., at 47 bátar fingu 1,9 mill. kr. meira í inntøkutrygd enn teir avreiddu fyri.

TALVA 4: inntøkutrygd í % av virði fyri bólk 5 fyri tíðarskeiðið 1. juni 1996 - 31. mai 1997

inntøkutrygd í % av virði	bátar	virðið	inntøkutrygd	munur
yvir 100 pct	47	2.958.892	4.871.698	-1.912.806
75 til 100 pct	18	2.249.014	1.940.939	308.075
50 til 75 pct	41	7.852.860	4.723.876	3.128.984
25 til 50 pct	61	15.747.440	5.858.557	9.888.883
00 til 25 pct	84	32.047.074	3.764.592	28.282.482
	251	60.855.280	21.159.661	39.695.619

Samanumtikið má sigast, at hóast virðið á veiðuni er vaksið munandi hjá útróðrarbátunum undir 15 BRT., og at talið av bátum og monnum, sum komu undir minstaforvinning er minkað, so er inntøkutrygdin til bólkin tvífaldað.

Figgjarligar avleiðingar

Tað er trupult at meta um, hvussu nógv skipanin eftir hesum uppskoti fer at kosta, men metti verður, at verður uppskotið samtykt við núverandi orðing, fer skipanin við mánaðarligum minstaforvinningin at kosta umleið 8 mió. kr. um árið. Tað eru nakrar óvissur, ið ger tað trupult at meta um, hvussu nógvir útróðrarmenn kunnu koma undir skipanina, m.a. broytingar í fiskanøgd og prísi og hvussu nógvir kunnu koma undir undantaksreglurnar í § 2, stk. 3. Umsitingarligu útreiðslurnar av skipanini verða tær sonnu.

Uppskotið hevur verið til ummælis hjá Fiskivinnustarvsnevndini og verða hesar viðmerkingar hjálagdar.

Viðmerkingar til tær einstøku greinarnar

Til § 1.

Úgjald av mánaðarligum minstaforvinningi kann bert latast til útróðrarmenn, sum eru heimahoyrandi í Føroyum ella sum samhert sáttmála við onnur lond kunnu koma undir skipanina.

Til § 2.

Treytin fyri at koma undir skipanina við mánaðarligum minstaforvinningi er, at avreiðingarvirðið teir seinastu 6 mánaðarnar undan tí mánaði, ið viðkomandi útróðrarmaður hevur rætt til útgjald úr skipanini, skal í minsta lagi vera í meðal kr. 10.000,- pr. mann pr. mánaða. Hetta merkir, at avreiðingarvirðið samanlagt skal hava verið kr. 60.000,- seinastu 6 máðarnar pr. mann, sum hevur verið við fiskiarinum, men at avreiðingarvirðið annars kann skifta frá mánaða til mánaða, t.d. fyrsta mánaða kr. 5.000 men næsta kr. 15.000,- o.s.fr.v.

Til § 3.

Talan er um ásetan av reglum um tilmeldan til skipanina við mánaðarligum minstaforvinningi, hvussu farast skal fram, tá avloysari fer umborð á útróðrarbát v.m.

Til § 4.

Upphæddin til mánaðarligan minstaforvinning er sett til kr. 7.500,- um mánaðin. Minstiforvinningurin verður minkaður við 5 kr fyri hvørjar 10 kr, ið útróðrarmaður hevur forvunnið í tí mánaði, sum minstiforvinningurin verður útgoldin fyri. Talan er um alla inntøku, fiskipartur íroknaður, uttan mun til hvør inntøkan er forvunnin ella um talan er um skattskylduga inntøku ella ikki.

Til § 5.

Reglur um, nær útgjald kann fara fram.

Til § 6.

Skipanin við mánaðarligum minstaforvinningi verður umsitin av Lønjavningargrunninum. Sambært stk. 2 kann landsstýrismaðurin í fiskivinnumálum áseta nærri reglur um mannagongdir í sambandi við umsiting av lógini.

Til § 7.

Almennir stovnar so sum Toll- og Skattstova Føroya hava skyldu at lata Lønjavningargrunninum upplýsingar í sambandi við viðgerð av málum um mánaðarligan minstaforvinning. Somuleiðis hava onnur so sum vinnufeløg v.m. skyldu at lata upplýsingar. Um Lønjavningargrunnurin ikki fær nøktandi upplýsingar til tess at viðgera eina umsókn, eigur henda at vera avvíst við hesi grundgeving.

Til § 8.

Regur um gildiskomu lógarinnar. Samstundis fer galdandi løgtingslóg um mánaðarligan minstaforvinning úr gildi.

1. viðgerð 4. desember 1997. Uppskotið verð beint í vinnunevndina, sum tann 19. desember 1997 legði fram soljóðandi:

Álit

Málið var lagt fyri løgtingið av landstýrinum 2. desember 1997 og eftir 1. viðgerð 4. desember 1997 beint í vinnunevndina.

Vinnunevndin hevur viðgjørt uppskotið og hevur undir viðgerðini havt fund við landsstýrismannin í fiskivinnumálum við umsiting, Vaktar- og Bjargingartænastuna, Lønjavningargrunnin, Meginfelag Útróðrarmanna og Landsfelag vinnurekandi útróðrarmanna.

Nevndin hevur undir viðgerðini býtt seg í ein meirilluta og tveir minnilutar.

Meirilutin (Jørgen Niclasen, Bjørn á Heygum, Óli Jacobsen og Lasse Klein) tekur undir við uppskoti landsstýrisins við nøkrum broytingum.

Tað er undir nevndarviðgerðini komið fram, at mánaðarligur minstiforvinningur í hesum árinum verður í minsta lagi 30 mió. kr. Tí metir meirilutin, at her eiga at verða gjørdar broytingar. Orsøkirnar til so høgt tal eru fleiri, men ein av orsøkunum er vantandi fiskidagatal hjá ávísum pørtum av útróðrarflotanum. Upplýst er fyri nevndini, at í fyrra hálvári av fiskiárinum hevur bólkur 5 fingið tillutað og brúkt fylgjandi fiskidagar:

	Bólkur 5A	Bólkur 5B	Bólkur 5D
Tillutaðir fiskidagar 1. sep. til 1. Mars.	8. 269	4772	1772
Avreiðingar 1. sep. til 10. des.	3.209	733	1171

Út frá hesum sæst, at hóast meira enn helmingurin av tíðarskeiðnum er farin, hava bólkarnir 5A og 5B brúkt væl minni enn helvtina av tillutaðu fiskidøgunum. Í Føroyum hevur útróður altíð verið ein serligur partur av vinnumentanini, tí er óheppið, at tað nú er sanlíkt, at tað verða nakrir bátar, sum koma at renna seg upp undir loftlið, meðan teir nógvu ikki koma at brúka sínar fiskidagar. Meirilutin mælir tí landsstýrismannin til at seta seg í samband við útróðrarfeløgini um møguleikan at lata bátarnar í bólki 5 fiska frí innan fyri bólkarnar, men at seta eitt maksimum á fyri hvønn bátin. Tílík skipan hevði gjørt, at fiskidagarnir verða betur gagnnýttir, og at minni trýst verður á lógina um mánaðarligan minstaforvinning til útróðrarmenn. Ansast má tó eftir, at teir, sum mest hava summarútróðurin at liva av, ikki verða fyri vanbýti.

Undir viðgerðini er gjørt vart við, at hummaratiskiskapurin er tálmaður av fiskidagaskipanini. Til fiskiskap eftir hummara eru kvotur tillutaðar, og tað kann ikki verða rætt, at hesin fiskiskapur verður tálmaður av fiskidagaskipanini. Meirilutin heldur, at hummaratiskiskapurin skal regulerist við kvotum, og beitir tí á landsstýrismannin um at fáa sett í verk skipan, har fiskidagaskipanin ikki tálmar hummaratiskiskapinum.

Vísandi til viðmerkingarnar í løgtingsmáli nr. 42/1997: Broyting í løgtingslóg um minstuløn og dagstudning, mælir vinnunevndin til, at minstakrav fyri at fáa minstaforvinning skal verða, at persónur er búsitandi og harvið skattskyldugur í Føroyum, og setir tí fram broytingaruppskot samsvarandi hesum.

Nevndin er undir viðgerðini gjørd varug við, at prentvilla er í § 3 stk. 1 í lógaruppskotinum, har eitt "sum" er vorðið til eitt "um", og mælir meirilutin til at rætta villuna.

Meirilutin er eisini samdur um, at mánaðarligi minstiforvinningurin, tá av landsstýrinum er settur til kr. 7.500, verður hækkaður til kr. 8.200,- og, at markið fyri at koma undir skipanina verður lækkað frá kr. 10.000,- í meðal fyri hvønn mann, til at fiskast skal fyri í minsta lagi kr. 9.000,- í meðal fyri hvønn mann.

Umboð fyri útróður hava reist spurningin um fríðtíðarløn av minstaforvinninginum. Meirilutin heldur, at møguleiki eigur at verða hjá útróðrinum at fáa part av minstaforvinninginum umlagdan til fríðtíðarløn. Hetta merkir ikki, at útgjaldið verður hækkað við fríðtíðarløn, men at møguleiki verður hjá útróðrinum at velja at fáa part av uppskotna minstaforvinninginum útgoldan sum fríðtíðarløn. Meirilutin beitir á landsstýrismannin at umhugsa at gera tað møguligt fyri útróðrarfeløgini at fáa umlagt part av útgjaldinum til fríðtíðarløn.

Meirilutin er komin eftir, at orðingin í § 4 er ógreið, og hevur meirilutin tí fingið gjørt eina greiðari orðing, og mælir meirilutin til at seta nýggja orðing í § 4.

Meirlutin mælir við hesum viðmerkingum løgtinginum til at samtykkja uppskot landsstýrisins við niðanfyristandandi broyting.

Vísandi til omanfyristandandi setir nevndin fram soljóðandi

B r o y t i n g a r u p p s k o t

1) § 1 verður orðað soleiðis: "§ 1. Við tí endamáli at tryggja inntøkur útróðrarmanna, verður úr landskassanum latin mánaðarligur minstaforvinningur til manning, sum er heimahoyrandi í Føroyum, ella sum sambært sáttmála við onnur lond kann koma undir skipanina, og sum búgva í Føroyum og vinna á føroyskt skrásettum fiskiførum á útróðri á føroysku landleiðunum.
2) Í § 2 stk. 1 verður "10.000,-" broytt til "9.000,-".
3) Í § 3 stk. 1 seinasta pkt. verður orðið "um" broytt til "sum".
4) § 4 verður orða soleiðis: "§ 4. Mánaðarligur minstiforvinningur til útróðrarmenn er kr. 8.200,- um mánaðin. Minstiforvinningurin verður minkaður við kr. 5,- fyri hvørjar kr. 10,-, ið útróðrarmaður hevur forvunnið í aðrari inntøku.

Stk. 2. Fyri A-inntøku verður minkingin sambært stk. 1 roknað í mun til tá uppheedd. ið útróðrarmaðurin sambært skattavaldinum hevur fingið útgoldið í inntøku, utan mun til nær inntøkan er forvunnin í mánaðinum, sum minstiforvinningurin verður útgoldin fyri.

Stk. 3. Fyri B-inntøku verður minkingin sambært stk. 1 roknað í mun til uppgjørdu skattskyldugu inntøkuna sambært roknskapi fyri avvarðandi ár.

Stk. 4. Er talan um fiskipart eftir hesi skipan, verður minkingin sambært stk. 1 roknað við støði í 42% av bruttoavreiðingarvirðinum, býtt við manningartalinum.

Stk. 5. Fríðtíðarløn verður ikki løgd omaná minstaforvinning."

Minnilutin (Heini O. Heinesen og Álvur Zachariasen) tekur ikki undir við uppskotinum frá landsstýrinum. Heldur ikki kann minnilutin taka undir við teimum broytingum, sum meirlutin í nevndini skjýtur upp. Upp-

skotnu broytingarnar eru sjálvandi ein bati í mun til landsstýrisuppskotið. Tað, sum er sera ódámligt, er, at verandi lóg skal setast úr gildi fyri einhvønn prís, uttan at hava nakað at seta í staðin. Tað gevur at bíta, meginparturin av lógaruppskotinum er likin úr verandi lóg. Tað er tí ein heilt óvanlig mannagongd at gera nýggja lóg í staðin fyri at gera broytingar í verandi lóg.

Tá landsstýrið sigur í viðmerkingunum til lógaruppskotið, at vøksturin í minstaforvinninginum liggur í sjálvari skipanini við mánaðarligum minstaforvinningi. Hetta skrivar landsstýrið uttan at prógva, at so er. Veruleikin er tann, at tað er skipanin við fiskidøgum, sum er orsøk til, at tað ikki er møguligt at reka útróður, so tað lønar seg.

Á vári í 1997 gjørdu útróðrarfeløgini semju við landsstýrið um økt fiskidagatal. Hetta varð gjørt, tí fleiri bátar høvdu lítlar og ongar dagar eftir. Ikki fyrr enn í august býtti landsstýrismaðurin í fiskivinnumálum hátunum 25 dagar út aftur at, sum fiskiárið endaði 31. august.

Hetta sást aftur í tølunum fyri útgoldnan minstaforvinning summarið 1997. So landsstýrismaðurin kann takka sær sjálvum fyri úrslitið.

Víðari sigur landsstýrið í viðmerkingunum, at skipanin fer at kosta 8 mió. kr. Hesum trýr bara landsstýrið.

Tað, sum kemur at henda, er, at allur útróðrarflotin fer at mynstra eftir lógini um "minstuløn og dagstudning", sum er ein nógv dyrari skipan. Eisini verður skotið upp at seta manningartalið niður á bátum niðanfyri 20 tons, samstundis sum teir omanfyri kunnu verða so nógvir menn, sum teimum lystir. Heldur ikki skulu teir bátar, sum mynstra eftir lógini um "minstuløn og dagstudning", skjalprógva sínar útreiðslur.

Niðurstøðan er tann, at tá samun um kemur, so verður úrslitið vel dýrari fyri lønjavningargrunnin. Samstundis sum teir, sum treingja mest til inntøkutrygd, einki koma at fáa.

Minnilutin (Heini O. Heinesen og Álvur Zachariasen) mælir løgtinginum frá at taka undir við í lógaruppskotinum. Annars mælir minnilutin til at varðveita verandi skipan um "mánaðarligan minstaforvinning til skrásettar útróðrarmenn" við smærri broytingum.

Minnilutin (Henrik Old) tekur ikki undir við uppskotinum út frá tí, at minnilutin ikki hevur álit á, at landsstýrismaðurin eftirlíkar meirilutanum í ynskjum hansara, har hann mælir landsstýrismanninum til eitt og annað. Hetta tí, at Henrik Old av teim royndum hann gjørdi, tá semja var gjørd við Sambandsflokkin, Fólkaflokkin og aðrar í vinnunevndini, tá útróðrarflotin á vári í 1996 lá í Havn, orsakað av at fiskidagarnir vóru uppbrúktir. Henda avtala gjørdi, at báturnir fóru av aftur Havnini, men tá avtalan skuldi setast í verk, lupu hesir báðir flokkar frá gjørdu avtaluni.

Undir 1. viðgerð skjeyt Javnaðarflokkurin upp at gera eina roynd frá 1. mai til 31. august við at lata útróðrarbátar undir 15 tons fiska frítt. Hetta fekk ikki undirtøku frá meirlutanum í vinnunevndini.

Nú stundar móti jólum, og vanligt er at geva hvør øðrum jólagávur, tí kann Javnaðarflokkurin ikki taka undir við at útróðrarmonnum verður veitt tey út av lagi vánligu kor, sum meirlutin mælir til.

2. viðgerð 22. december 1997. Uppskot um at beina málið aftur í nevnd fall 13-0-19. Broytingaruppskot til §§ 1, 2, 3 og 4 samtykt 18-3-11. §§ 1, 2, 3 og 4 soleiðis broyttar samtykt 18-2-12. §§ 5 ,6, 7 og 8 samtykkar 18-2-12. At uppskotið soleiðis samtykt kann fara til 3. viðgerð. samtykt 18-2-12.

3. viðgerð 27. december1997. Løgtingsmenninir Jenis av Rana, Heini O. Heinesen, Jógvan A. Johannesen, Álvur Zachariasen og Ingeborg Vinther løgdu fram soljóðandi:

B r o y t i n g a r u p p s k o t

1) Í § 2 stk. 1 verða orðini " í meðal kr. 9.000,-" broytt til : "í meðal 1000 kg".

Viðmerkingar
Fyrt hevur verið fram m.a. frá vinnuni, at eitt "kilogrundarlag" er rættvísari enn "krónugrundarlagið" vegna náttúrligar broytingar í hesum seinna frá bygd til bygd og frá árstíð til árstíð. Hetta eru broytingar, sum longu í dag kunnu staðfestast, og seta tær útróðrarmenn ynskt at eftir, hvar teir eru búsettir.

Broytingin, sum er tilmælt av Meginfelag Útróðrarmanna, hevði forðað fyri hesum ójavnum.

Løgtingsmenninir Jørgen Niclasen, Bjørn á Heygum, Óli Jacobsen og Lasse Klein løgdu fram soljóðandi:

Broytingaruppskot

1) Í § 2, stk. 2, verða orðini "10 Brt. 3 menn, millum 10 og" strikað.
2) Í § 3, stk. 3, verður aftaná orðið "inntøkutrygdarskipan" sett orðini "ella koma undir hesa inntøkutrygdarskipan við fleiri fiskiførum."
3) Í § 4, stk. 1, verður aftaná orðini "aðrari inntøku" sett komma og orðini "fiskipartur íroknaður".
4) § 4, stk. 3 verður strikað.

§ 4, stk. 4, sum hereftir verður stk. 3, verður orðað soleiðis: "Stk. 3. Fr talan um fiskipart eftir hesi skipan, skal minkingin sambært stk. 1 verða roknað sum 42 % av bruttoavreiðingarvirðinum, býtt við manningartalinum."

Broytingaruppskot frá Jenis av Rana o.fl. fall 10-2-18. Broytingaruppskot frá Jørgen Niclasen o.fl. samtykt 18-2-10. Uppskotið, sum samtykt við 2. viðgerð og broytt við 3. viðgerð, endaliga samtykt 18-2-11.
Løgtingslóg nr. 166, 29. december 1997.
F.L. j. nr. 1525-9/93

42 Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um minstuløn og dagstudning

Ár 1997, týsdagin 2. desember, legði John Petersen, landsstýrismaður, vegna landsstýrið fram soljóðandi:

Uppskot
til
løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um minstuløn og dagstudning

§ 1.

Í løgtingslóg nr. 32 frá 27. mars 1992 um minstuløn og dagstudning við seinni broytingum verða gjørdar hesar broytingar:

1) Í § 3 verður sett inn sum stk. 2:
"*Stk. 2.* Fiskimenn á fiskiskipi á føroysku landleiðunum kunnu í einum fiskiári ikki fáa minstuløn fyri fleiri dagar enn avvarðandi skip hevur fingið tillutað av fiskidøgum sambært lógini um vinnuligan fiskiskap íroknað unusettum fiskidøgum.
2) Í § 3 verður sett inn sum stk. 3:
"*Stk. 3.* Eitt fiskiár verður roknað frá 1. september til 31. august árið eftir."
3) § 4 verður orðað soleiðis : "Minstalønin er kr. 12.725,00 um mánaðin ella 427,17 um dagin, hvør túrur roknaður sær. Hvør túrur verður roknaður byrjaður, tá farið verður úr føroyskari havn og endaður, tá komið er aftur í føroyska havn, um ikki annað er avtalað."
4) Í § 5, 1. stk., verða orðini "fyri hvønn dag, mynstrað er" broytt til : "fyri tað tal av døgum, sum minstaløn er veitt fyri"

§ 2.

Henda lóg kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

Viðmerkingar
Spurningurin um samsvar millum tal av fiskidøgum og tal av mynstringardøgum hevur verið nógv frammi í sambond við nevndararbeiðið í nevndini, sum er sett at viðgera alla verandi minstulønarskipanina, herundir skipanina við mánaðarligum minstaforvinningi. Víst hevur verið á, at onki er sum forður fyri, at skip hava fleiri mynstringardagar enn tal av tilluteðum fiskidøgum á føroysku landleiðini.

Samsvarandi § 5, stk. 5 í tógini um vinnuligan fiskiskap (løgtingslóg nr. 28/1994 við seinni broytingum) verður *"talið av fiskidøgum, ið eitt fiskifar hevur nýtt ein túr, verður roknað frá tí, at túrur byrjar til túrur endar."* Í fiskiloyvunum, sum øll fiskifør undir fiskidagaskipanini hava, verður nærri ásett, at *"talið av fiskidøgum, ið eitt fiskifar hevur nýtt ein túr, verður roknað frá tí, at farið verður úr havn til komið er aftur í havn."*

Tað kann koma fyri, at manningin á fiskifari hevur verið undir mynstring ein túr í fleiri dagar, enn fiskifari hevur verið úr havn.

Minstaløn og dagstudningur eru ásett í løgtingslóg nr. 32 frá 27. mars 1992 við seinni broytingum. § 3 ásetir undir hvørjum treytum, fiskimanni er tryggjað minstuløn. Tal av døgum, sum fiskimaður kann vera undir minstuløn, er ikki avmarkað. Í § 4 verður ásett, at minstalønin verður roknað fyri hvørja veiðiferð (túr) sær. Onki verður sagt um, hvussu dagarnir hvønn túrin verða gjørdir upp. Vanligt er, at gingið verður eftir skipsmanningarskjalinum. Er mynstrað nakrar dagar framman undan, verða hesir dagarnir roknaðir upp í mynstringardagarnar. Sostatt verður grundarlagið fyri møguligari minstuløn hvønn túrin sær størri, enn um beinleiðis var ásett, at bert dagarnir, frá tí at farið er úr havn til komið er aftur í havn, eru grundarlagið.

Mynstring er, at ein starvsavtala er gjørd millum reiðara og sjómannin og skal skipanin vera ein trygdarskipan fyri fiskimenn í teirra starvi á sjónum. Við verandi fiskidagaskipan er avmarkað, hvussu nógvar dagar eitt fiskifar kann vera til fiskiskap í einum fiskiári. Landsstýrismaðurin í fiskivinnumálum heldur, at samsvar skal vera millum teir dagar, sum ein skipsmanning er undir mynstring til fiskiskap á føroysku landfeiðunum og tað tal av fiskidøgum, sum skipið hevur rætt til í einum fiskiári íroknað umsettir fiskidagar. Tí verður skotið upp at broyta tógina um minstuløn og dagstudning, so samsvar er millum ásetingarnar um mynstringardagar og fiskidagar. Broytingarnar fara at gera, at skipanin við minstuløn og dagstudningi fer at virka, sum upprunaliga ætlað.

Lønjavningargrunnur Skipsfiskimanna og Fiskivinnustarvsnevndin hava havt uppskotið til ummælis.

Mett verður, at uppskotið fer at minka kostnaðin av minstulønarskipanini nakað, og at fyrisitingarligu uppgávurnar í sambond við hesa lóg verða óbroyttar.

Viðmerkingar til tær einstøku broytingar
Ad. § 1, nr. 1). Henda broyting ásetir, at fiskifar í einum fiskiári ikki kann hava fleiri mynstringardagar til fiskiskip á føroysku landleiðunum enn tað talið av fiskidøgum, sum farið hevur lógarliga tilluteð íroknað umsettir fiskidagar.

Ad. § 1, nr. 2). Henda broyting er til tess at staðfesta, hvussu fiskiárið nevnt í broyting 1) skal skiljast. Hetta er sama allýsing, sum í tógini um vinnuligan fiskiskap (løgtingslóg nr. 28 frá 10. mars 1994 við seinni broytingum).

Ad. § 1, nr. 3). Seinni setningur í hesi broytinginj er nýggjur. Hann verður settur inn, so greiðliga er ásett, hvussu dagarnir fyri hvønn túr sær verða gjørdir upp. Hetta ávirkar ikki mynstring í útlendskari havn, tá annað er avtalað.

Ad. § 1, nr. 4). Henda broyting verður gjørd til tess, at dagstudningur ikki verður veittur fyri fleiri dagar enn talið av døgum, sum minstaløn verður veitt fyri.

1. viðgerð 4. desember 1997. Uppskotið verið beint í vinnunevndina, sum tann 19. desember 1997 legði fram soljóðandi:

Álit

Málið var lagt fyri løgtingið av landsstýrinum 2. desember 1997 og eftir 1. viðgerð 4. desember 1997 beint í vinnunevndina.

Vinnunevndin hevur viðgjørt uppskotið og hevur undir viðgerðini havt fund við landsstýrismannin í fiskivinnumálum og umsiting hansara, Vaktar- og bjaringartænstuna og Lønjavningargrunnin.

Nevndin hevur býtt seg í ein meirluta og ein minniluta.

Meirlutin (Jørgen Niclasen, Bjørn á Heygum, Henrik Old, Óli Jacobsen og Lasse Klein) er undir viðgerðini komin eftir, at norðurlendingar, sum ikki búgva í Føroyum og tí ikki gjalda skatt í Føroyum, fáa minstuløn. Tað hevur í hesum sambandi verið ført fram, at konventiónin um felags norðurlendskan arbeiðsmarknað tryggjar javnrættindi millum allar norðurlendskar arbeiðstakarar. Meirlutin hevur kannað henda spurning, og er niðurstøðan, at hetta ikki førir við sær, at møguleiki ikki er at seta krav um bústað sum treyt fyri at veita minstuløn, minstaforvinning og dagstudning. Meirlutin heldur, at minstakrav fyri at fáa minstuløn er, at persónur er búsitandi og harvið skattskyldugur í Føroyum, og setir tí fram broytingaruppskot samsvarandi hesum.

Meirlutin er eisini samdur um, at skipanin við minstuløn og dagstudningi er ætlað og gjørd til størri skip, sum gera túrar, sum greitt kunnu definerast, meðan reglur um útróður skulu verða í lógini um mánaðarligan minstaforvinning til útróðararmenn. Meirlutin skjytur tí upp, at treytin, ið verður sett fyri at koma undir lógina um minstuløn og dagstudning, er, at fiskifør eru í minsta lagi 30 BRT, og at ikki verður engt í landi.

Í § 1, 1) í uppskotinum verður ásett, at fiskimenn á fiskiskipi á føroysku landleiðunum kunnu í einum fiskiári ikki fáa minstuløn fyri fleiri dagar, enn avvarðandi skip hevur fingið tillutað av fiskidøgum samsvarandi lógini um vinnuligan fiskiskap íroknað umsettum fiskidøgum. Her hevur landsstýrið ikki tikið hædd fyri umbýtingini av fiskidøgum millum innaru og ytru fiskileið. Ætlanin við uppskotinum er, at minstaløn skal verða galdandi fyri teir dagar, fiskimenn eru til fiskiskap. og eigur hetta við umbýttum døgum at vera við. Meirlutin mælir tí til at seta orðini "og umbýttum" inn í § 1, 1).

Í § 4 skjýtir landsstýrið upp, at hvør túrur verður roknaður byrjaður, tá farið verður úr føroyskari havn og endaður, tá komið er aftur í føroyska havn, um ikki annað er avtalað. Meirlutin heldur, at tað er ógreitt, hvønn hendan avtalan skal gerast ímillum, um undantak skal gerast, men at møguleiki eigur at verða at geva undantak. Her verður serliga hugsað um rækjuskip, sum ikki kemur í føroyska havn millum túrar og skiftir manning í útlendskari havn. Mælt verður tí til, at landsstýrismaðurin fær heimild til at áseta nærri reglur um undantak frá reglunum í § 4, 2. pkt.

Henrik Old tekur fyrivarni við einstøkum av broytingunum vegna umsitingarligar trupulleikar.

Meirlutin mælir løgtinginum til at samtykkja uppskot landsstýrisins við omanfyrinevndu broyting og setir fram soljóðandi

Broytingaruppskot

I. § 1, 1) verður orðað soleiðis:
"1) § 1 verður orðað soleiðis: "Við tí endamáli at tryggja inntøkur fiskimanna verður landsstýrinum heimilað at útgjalda minstuløn og dagstudning til persónar, heimahoyrandi í Føroyum, um tað ikki er í stríð við aðrar avtalur, og sum búgva í Føroyum og vinna á føroyskum fiskiførum, sum í minsta lagi eru 30 BRT, og sum hava veiðiloyvi og ikki egna í landi."

II. Í § 1, 1) sum hereftir verður 2) verður aftaná orðið

"umsettum" sett "og umbýtum".
III. § 1, 2) verður hereftir 3).
IV. Í § 1, 3) sum hereftir verður 4) verða orðini "um ikki annað er avtalað" strikað, og punktum verður sett aftaná orðini "føroyska havi". Aftaná punktum verður sett soljóðandi áseting: "Landsstýrismaðurin kann seta nærri reglur um undantak frá reglunni í 2. pkt."
V. § 1, 4) verður hereftir 5).

Minnilutin (Heini O. Heinesen og Álvur Zachariasen) tekur ikki undir við broytingaruppskotinum frá nevndini, um at bátar undir 30 tons ikki skulu hava sama rætt sum teir størru bátarnir. Heraftrat kemur, at lógin um mánaðarligan minstaforvinning ikki er nøkur inntøkutrygd. Annars verður víst til viðmerkingarnar hjá minnilutanum í løgtingsmáli nr. 41/1997: Uppskot til løgtingslóg um mánaðarligan minstaforvinning til útróðrarmenn.

2. viðgerð 22. december 1997. Broytingaruppskot til § 1 samtykt 23-3-6. § 1 soleiðis broytt samtykt 23-6-3. At uppskotið soleiðis samtykt kann fara til 3. viðgerð, samtykt 23-7-2.

3. viðgerð 27. december 1997. Uppskotið,sum samtykt við 2. viðgerð, endaliga samtykt 21-10-0.

Løgtingslóg nr. 165, 29. december 1997.
F.L. j. nr 1525-9/93

43 Nýval av nevndum

Ár 1997, mánadagin 8. desember, legði Óli Breckmann, løgtingsmaður, vegna seg sjálvan og løgtingsmenninar Bjørn á Heygum, og Óla Jacobsen, fram soljóðandi:

Uppskot
til
samtyktar

Løgtingið samtykkir, at løgtingsnevndirnar, sum eru umrøddar í § 24 í tingskipanini, verða valdar av nýggjum

Viðmerkingar
Av tí at samgongan er umskipað, fyrir hetta við sær, at politiska samansetingin á tingi er øðrvísi, enn tá nevndirnar vóru valdar seinast.

Út frá hesum metir uppkotsstillarin, at nevndarval eigur at fara fram av nýggjum smb. § 26 í tingskipanini.

1. viðgerð 10. desember 1997. Uppskotið varð uttan nevndarviðgerð beint til 2. viðgerð.

2. viðgerð 15. desember 1997. Uppskotið samtykt 21-0-8.

44 Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslógunum um útvarpsnevnd og um Sjónvarp

Ár 1997, mánadagin 15. desember, legði Bjarni Djurholm, løgtingsmaður, vegna seg sjálvan og løgtingsmenninar Signar á Brúnni, Lisbeth L. Petersen, Marin Hansen, Rúna Sivertsen, Jógvan Adolf Johannessen og Jenis av Rana fram soljóðandi

Uppskot
til
løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um um útvarpsnevnd og um Sjónvarp

§ 1.

Í løgtingslóg nr. 140 frá 20. desember 1996 um útvarpsnevnd verður í § 7 "1. januar 1998" broyttur til "1. mars 1998"

§ 2.

Í løgtingslóg nr. 141 frá 20. desember 1996 um sjónvarp verður í § 12 "1. januar 1998" broyttur til "1. mars 1998"

§ 3.

Løgtingslógin fær gildi 1. januar 1998.

Viðmerkingar

Landsstýrismaðurin í mentamálum legði tann 7. november 1997 løgtingsmál nr. 23: Uppskot til løgtingslóg um kringvarp fyri løgtingið. Eftir 1. viðgerð tann 18. november 1997 varð málið beint í mentananevndina. Nevndin er farin undir at viðgera málið, men er komin til ta niðurstøðu, at tað verður trupult at avgreiða málið innan 1. januar 1998, tá løgtingslóg um Sjónvarp og løgtingslóg um útvarpsnevnd fara úr gildi. Hetta orsakað av stórari arbeiðsbyrðu vegna viðgerðini av kirkjulógunum, og at kitukur kom í arbeiðið, tá landsstýrismaðurin í mentamálum varð loystur úr starvi.

Fyri at byrgja fyri, at stovnarnir koma at liggja í lógloysi 1. januar, hava niðanfyristandandi tingmenn gjørt av at heita á tingið um at leingja galdandi lógir at hava gildi til 1. mars 1998. Viðmerkjast skal, at mentananevndin roknar við at kunna avgreiða lógina um kringvarp í góðari tíð innan 1. mars, men heldur tað vera betri at gera tíðarskeiðið, lógin verður longd, í longra heldur enn styttra lagi.

1. viðgerð 16. december 1997. Uppskotið varð uttan nevndarviðgerð beint til til 2. viðgerð.

2. viðgerð 22. december 1997. Uppskotið samtykt 21-0-0. At uppskotið soleiðis samtykt kann fara til 3. viðgerð, samtykt 26-0-0.

3. viðgerð 27. december 1997. Uppskotið, sum samtykt við 2. viðgerð, endaliga samtykt 27-0-0.

Løgtingslóg nr. 162, 29. december 1997.

45 Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um stuðul til flutning av fiski

Ár 1997, mánadagin 15. december, legði Lasse Klein, løgtingsmaður, vegna Kristiliga Fólkaflokkin Føroya Framburðs- og Fiskivinnuflokk fram saljóðandi:

U p p s k o t
til
løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um stuðul til flutning av fiski

§ 1.

Í løgtingslóg nr. 67 frá 13. juni 1995 um stuðul til flutning av fiski, sum broytt við løgtingslóg nr. 112 frá 13. juni 1997, verða gjørdar hesar broytingar:

1) Sum nýtt stk. 2 verður sett:
"Stk. 2. Stuðulin er treytaður av, at flutningsfelag, sum tað almenna eigur ella letur stuðul til, ikki verður nýtt til flutning uttan so, at eingin annar møguleiki er.

§ 2.

Henda lóg kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

Viðmerkingar
Strandfaraskip Landsins trokar alt fleiri privatar bileigarar, sum flyta fisk frá uppboðssølum o.ø., av marknaðinum við tí úrslitið, at teir mugu gevast við sínum virksemi.

Tað hevur onguntíð verið ætlanin, at tað almenna skuldi taka kappingina upp við privatar á hesum øki, og gongdin er so mikið ørkymlandi, at neyðugt verður at steðga hesi gongd.

Fyrimunirnir hjá Strandferðsluni í mun til privatar er so eyðsynlig, og tí ber ikki til at lata eyguni aftur fyri hesum veruleika.

Umframt at Strandfaraskip Landsins fáa ein árligan stuðul yvir fíggjarlógina uppá umr. 50 mió. kr., hava teir nú eisini møguleika at fáa almennan flutningsstuðul. Umframt møguleikan fyri at gera avtalur um bíligari flutningsprísir.

Henda kapping er nú so hørð, og fyrimunirnir hjá strandferðsluni so stórir, sum almennu flutningstólini kunnu fáa frá egnum skipum, at vandi kann verða fyri, at allur flutningur á sjógvi og landi endar hjá tí almenna, og tað kann ikki verða ætlanin.

1. viðgerð 17. desember 1997. Uppskotið verð beint í vinnunevndina.

Málið fall burtur sbr. stýrisskipanarlógini § 15 stk. 3, tí at løgtingsval var 30. apríl 1998, og málið ikki var liðugt viðgjørt á tingi fyri valið.

46 Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um ásetan av almannaveitingum

Ár 1997, týsdagin 16. desember, legði Kristian Magnussen, landsstýrismaður, vegna landsstýrið fram soljóðandi:

Uppskot
til
løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um ásetan av almannaveitingum

§ 1.

Í løgtingslóg nr. 117 frá 2. december 1994 um ásetan av almannaveitingum, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 145 frá 30. december 1996, verður gjørd hendan broyting:

Í § 3 verður "31. december 1997" broytt til: "31. december 1998".

§ 2.

Hendan løgtingslóg fær gildi dagin eftir, hon er kunngjørd.

Viðmerkingar
Við løgtingslóg nr. 117 frá 2. desember 1994 vórðu almannaveitingarnar fyri fyrstu ferð ásettar av løgtinginum. Upphæddin á teimum ymisku almannaveitingunum hava verið tær somu síðani 1. juli 1993, og sambært løgtingslóg nr. 117 frá 2. desember 1994 um ásetan av almannaveitingum, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 145 frá 30. desember 1996, verður hetta galdandi fram til 31. desember 1997. Tá fer verandi løgtingslóg um ásetan av almannaveitingum úr gildi.

Samstundis sum løgtingslóg um ásetan av almannaveitingum verð samtykt, samtykti løgtingið at áleggja landsstýrinum at leggja fyri tingið lógaruppskot við reglum um áseting av almannaveitingum, har heimilað verður landsstýrinum við kunngerð at ásetu greinaligari reglur um fyrisitingina av hesari skipan.

Hetta hevur verið skilt soleiðis, at løgtingið við hesum hevur álagt landsstýrinum at koma við uppskoti um, hvussu upphæddin á almannaveitingum eigur at javnast, soleiðis at tann árliga ásetanin av almannaveitingunum verður ein fyrisitingarlig avgerð hjá landsstýrismannimum í almannamálum at taka sær av.

Ein arbeiðsbólkur hevur arbeitt við at gera nágreiniligar útrokningar um, hvat árligi kostnaðurin má metast at verða, um almannaveitingarnar verða javnaðar eftir prístalinum ella lønargongdini. Áliðið varð tíðugt á summri 1996, og mælti arbeiðsbólkurin til, at prístalið skuldi nýtast sum grundarlag, tá almannaveitingarnar skuldu javnast.

Verður ein lóg um at javna almannaveitingar samtykt, og kemur í gildi komandi ár. Ferur hetla við sær eina meirútreiðslu uppá 5,5 mió.kr. fyri 1998. Hetta er roknað út soleiðis, at ársfjórðingarnir

juli 1994 - apríl 1995 eru settir til indeks 100, har var meðalprístalið 154,1,

juli 1995 - apríl 1996 eru settir til indeks 102,5, har var meðalprístalið 158 og

juli 1996 - apríl 1997 eru settir til indeks 105,5, har var meðalprístalið 162,6.

Hækkingin uppá 5,5 mió.kr. eru prosentvísa hækkingin, indeks 102,5 til 105,5, sum er 2,81%. Árliga hevði hetta kostað 11 mió.kr., men í álitinum mælir arbeiðsbólkurin til, at reguleringin fer fram 1. juli á hvørjum ári, tí verður meirútreiðslan sett til 5,5 mió.kr., eitt hálv ár.

Øllum kunnugt resta 12 mió.kr. í til pensiónir á verandi uppskoti til fíggjarlóg, sum liggur til viðgerðar í løgtinginum í løtuni. Tí verður mett, at tað er heilt órealistiskt og eisini heilt skeivt, at koma við einum uppskoti til komandi ár, um at javna og harvið hækka pensiónina.

Verandi lóg um ásetan av almannaveitingum fer úr gildi 31. desember í ár. Tí verður skotið upp, at lógin verður broytt, so hon verður verandi í gildi í eitt ár aftrat. Landsstýrismaðurin í almannamálum ætlar at fáa sær politiskt grundarlag at leggja fram eitt uppskot til løgtingslóg um javnan av almannaveitingum seinni í hesi tingsetu.

Ongar fíggjarligar avleiðingar eru av at broyta verandi lóg, av tí at landsstýrismaðurin í almannamálum í uppskoti sínum til fíggjarlóg fyri 1998 ikki hevur roknað við hækking av almannaveitingunum.

1. viðgerð 18. desember 1997. Uppskotið varð uttan nevndarviðgerð beint til 2. viðgerð.

2. viðgerð 22. december 1997. Uppskotið samtykt 27-0-0. At uppskotið soleiðis samtykt kann fara til 3. viðgerð, samtykt 27-0-0.

3. viðgerð 27. december1997. Uppskotið, sum samtykt við 2. viðgerð, endaliga samtykt 27-0-0.

Løgtingslóg nr. 164, 29. december 1997.

F. L. j. nr. 1010-10/93

47 Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um stuðul til dupult húsarhald

Ár 1997, týsdagin 16. december, legði John Petersen, landsstýrismaður, vegna Anfinn Kallsberg, landsstýrismann, vegna landsstýrið fram soljóðandi

Uppskot
til
løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um stuðul til dupult húsarhald

§ 1.

Í løgtingslóg nr. 95 frá 6. juni 1997 um stuðul til dupult húsarhald verður gjørd hesa broyting:
§ 1 verður orðað soleiðis:
"§ 1. Rætt til stuðul eftir hesi lóg hevur giftur persónur, búsitandi í Føroyum, sum av arbeiðsávum hevur útreiðslur til dupult húsarhald.".

§ 2.

Henda lóg kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd, og er galdandi frá og við inntøkuárinum 1997.

Viðmerkingar

Landsstýrismaðurin í fíggjarnálum er gjørdur varur við, at broytingar gjørdar av løgtinginum í løgtingslóg nr. 95 frá 6. juni 1997 um dupult húsarhald kunna hava við sær, at tað kann vera trupult fyri føroysk virki at útvega útlendska arbeiðsmegi, tá hetta er neyðug fyri at klára ávísar arbeiðsuppgávur.

Orsøkin til hetta er, at § 1 í omanfyri nevndu løgtingslóg um stuðul til dupult húsarhald nú er orðað soleiðis, at bert persónar, sum flyta í aðra kommunu í Føroyum at arbeiða, og sum hava útreiðslur í sambandi við dupult húsarhald í Føroyum, fáa stuðul til útreiðslur til dupult húsarhald. Ein útlendingur, sum arbeiðir í Føroyum, hevur við hesi orðing ikki møguleika at fáa stuðul til dupult búsarhald.

Við atliti til føroyskt vinnulív er ynskiligt, at reglurnar um stuðul til dupult húsarhald verða broyttar soleiðis, at útlendsk arbeiðsmegi, sum flytir til Føroya av arbeiðsávum, eisini eigur møguleikan at fáa stuðul til dupult búsarhald.

Sambært § 1, nr. 1 í skattalógini, hevur persónur, ið hevur bústað í Føroyum, fulla skattskyldu. Sjálvt um tað soleiðis í hesum lógaruppskoti ikki beinleiðis verður nevnt, at umsøkjarin skal hava fulla skattskyldu til Føroyar, er hetta framhaldandi eitt krav.

Stuðulin verður bert veittur fyri dupult húsarhald av arbeiðsávum, og verður tí kravt:
1) at talan í roynd og veru er um tvey húsarhald, og
2) at arbeiðið er arvoldin til hetta.

Treytin um dupult húsarhald er lokin, tá umsøkjarin byr við arbejðsstaðið, meðan hiskið byr aðrastaðni, og so langt frá arbeiðsstaðnum, at daglig ferðing antin ikki er møgulig ella hevði havt við sær órímuligar trupulleikar, útreiðslur ella tíðarnytsla.

Fyrisitingarligar og fíggjarligar avleiðingar sum standast av uppskotinum

Fyrisitingarligir trupulleikar sum standast av uppskotinum verða fáir. Av tí at bert fáir persónar fáa stuðul til dupult húsarhald aftrat teimum, ið longu fáa stuðul, verður meirkostnaðurin av uppskotinum sera lítil. Uppskotið verður mett at kosta nakrar fáar túsund kr.

1. viðgerð 18. december 1997. Uppskotið verður beint í fíggjarnevndina, sum tann 22. december 1997 legði fram soljóðandi

Átt

Málið varð lagt fram av landsstýrinum tann 16. desember 1997 og eftir 1. viðgerð tann 18. desembar 1997 beint í fíggjarnevndina.

Nevndin hevur viðgjørt málið, tá snýr seg um at gera broytingar í løgtingslóg nr. 96 frá 6. juni 1997 um dupult húsarhald, tí eftir lógini kann tað vera trupult fyri føroysk virki at útvega útlendska arbeiðsmegi, tá hetta er neyðugt til at klára ávísar arbeiðsuppgávur.

Ein samd nevnd tekur undir við uppskotinum og mælir tinginum til at samtykkja uppskot landsstýrisins.

2.viðgerð 27. december 1997. Uppskotið samtykt 20-4-1. At uppskotið soleiðis samtykt kundi fara til 3. viðgerð, samtykt 20-5-0.

Samhert § 85 í tingskipanini varð samtykt at víkja frá tíðarfreistini millum 2. og 3. viðgerð 18-0-4.

3. viðgerð 30. december 1997. Uppskotið, sum samtykt við 2. viðgerð, endaliga samtykt 21-4-0.

Løgtingslóg nr. 174, 30. december 1997.

F.L. j.nr. 2540-42/97

48 Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um landsskatt og kommunuskatt

Ár 1997, týsdagin tann 16. december, legði John Petersen, landsstýrismaður, vegna Anfinn Kallsberg landsstýrismann, vegna landsstýrið fram soljóðandi

Uppskot
til
løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um landsskatt og kommunuskatt

§ 1.

Í løgtingslóg nr. 86 frá 1. september 1983 um landsskatt og kommunuskatt við seinni broytingum verða gjørdar hesar broytingar:

1) Í § 48, stk. 2 verður 1. lið orðað soleiðis:
"Stk. 2. Atvinnu í eini kommunu hevur tann persónur, tað deyðsbúgv, felag v.m. ella felagsskapur (smb § 1, nr. 7, 8, 10, 11, 12, 13, 14 og 15), ið:".
2) Í § 48, stk. 2, nr. 1 fella orðini "banka" og "tryggingar" burtur.
3) Eftir § 48 verður sum nýggj grein sett:
"§ 48a. Peningastovnar, tryggingarfeløg og vinnurekandi grunnar, sum eftir reglunum í hesi lóg bert eru skattskyldug til eina kommunu sum tilhalds-/heimakommunu, eru atvinnuskattskyldug til allar hinar kommunurnar í Føroyum.".
4) Í § 49, stk. 5 verður eftir "v.m." sett: ",burtursæð frá teimum í § 48 a nevndu,".
5) Í § 49 verður sum nýtt stk. sett:
"Stk. 6. Tey í § 48a nevndu feløg v.m. eru skattskyldu til atvinnukommununurnar tá treytirnar fyri skattskyldu til tilhalds-/heimakommununa eru loknar.".
6) Í § 51, stk. 4, 2. pkt. fellur "inntøkum felagsins v.m.." burtur, og ístaðin kemur: "inntøkunum hjá feløgum v.m., smb. § 48, stk. 2, nr. 1,".
7) Eftir § 51, stk. 4. 2. pkt. kemur sum nýtt pkt.:
"Av tí kommunuskatti, sum verður álíknaður í heimstaðarkommununi av samanløgdu inntøkunum hjá teimum í § 48a nevndu feløgum v.m., eiga atvinnukommununurnar so stóran part, sum lutfalsliga svarar til fólkatalið í atvinnukommununum við endan av tí roknskaparskeiði, sum liggur til grund fyri álíkningini.

§ 2.

Henda lóg kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd, og er galdandi fyri álíkningina fyri inntøkuárið 1997 og framyvir.

Viðmerkingar
Í samband við at tryggingarvirksemið er blivið skattskyldugt, sparikassar eru blivnir skattskyldugir, og at Føroya Banki allur fer at rinda skatt, er spurningurin viðgjørdur um, hvussu rættast er at býta skattin av hesum virksemi millum tær einstøku kommununar.

Niðurstøðan av hesi viðgerð er, at rættast er at býta skattin í mun til fólkatalið í kommununum.

Uppskotið broytir einki uppá samlaða skattin, ið peningastovnar, tryggingarfeløg og vinnurekandi grunnar koma at gjalda, og merkir heldur ikki nakra meirumsiting.

Viðmerkingar til tær einstøku broytingarnar
Að 1) Ætlanin við hesi broyting er at gera serreglur fyri býlið av kommunuskatti hjá peningastovnum, tryggingarfeløgum og vinnurekandi grunnum.

Ávísingin til § 1, nr. 7-16 verður tí broytt, soleiðis at nr. 9 og 16 (sparikassar, tryggingarfeløg og vinnurekandi grunnar) verða tikin burturúr. Hetta verður gjørt, tí hesar ávísingar vísa til ta vanligu allýsingina av føstum rakstrarstaði, meðan nýggju reglurnar fyri peningastovnar, tryggingarfeløg og vinnurekandi grunnar beinleiðis áseta, at atvinna hjá teimum er í teimum kommunum uttanfyri heimstaðarkommununa, har fólk búgva, ið hava samband við hesi feløg v.m., sjálvt um feløgini v.m. ikki beinleiðis hava deildir har.

Hetta merkir sostatt, at peningastovnar, tryggarfeløg og vinnurekandi grunnar, sum hava deildir í ávísum kommunum, og nú bert rinda atvinnuskatt til hesar kommunur, framyvir fara at rinda atvinnuskatt til allar kommunur í Føroyum.

Að 2) Henda broyting er ein fylgjubroyting til nr. 1. Reglan tengdi áðrenn broytingina atvinnuskattskyldu at føstum rakstarstaði.

Að 3) Her verður so eitt nýggj grein sett inn, sum ásetir, at penitgastovnar, tryggingarfeløg og vinnurekandi grunnar, sum í løtini hava eina kommunu í Føroyum sum tilhalds-/heimakommunu, fáa allar hinar kommunar í Føroyum sum atvinnukommunur.

Að 4) Í tí galdandi § 49, stk. 5 er ásett, at atvinnuskattskyldan tekur við, tá feløg v.m. taka upp tað í § 48, stk. 2 nevnda vinnuliga virkið í atvinnukommununi.

Tá tær nýggju ásetingarnar júst ikki eru tengdar at virksemi í atvinnukommununi, er neyðugt at avmarka hetta stk. til at galda fyri feløg v.m., burtursæð frá teimum feløgum v.m., sum tað er ætlanin at benda broyting skal viðvíkja, nevniliga peningastovnar, tryggingarfeløg og vinnurekandi grunnar.

Að 5) Henda orðingin er sett í sum framhald av broyting nr. 4, og merkir hetta, at atvinnuskattskyldan hjá peningastovnum, tryggingarfeløgum og vinnurekandi grunnum tekur við, tá treytirnar fyri tilhaldsskattskyldu eru loknar.

Að 6) Henda broyting er gjørd við sama grundgeving sum broyting nr. 4, nevniliga, tí at atvinnuskattskyldan ikki er tengd at vinnuligum virki í atvinnukommununi. Tessvegna er síðani orðingin í nr. 7 sett inn.

Að 7) Her verður so staðfest, hvussu stóran part av tilhaldskommunuskattinum atvinnukommununar skulu hava. Mælt verður til at býta skattin í lutfalli við fólkatalið í kommununum, og at nyta fólkayvirlitstølini við endan av tí roknskaparskeiði, sum liggur til grund fyri álíkningini, sum grundarlag.

Í viðgerð tann 18. december 1997. Uppskotið varð heint í figgjarnevndina, sum tann 22. december 1997 legði fram soljóðandi

Álit

Málið varð lagt fram av landsstýrinum tann 16. desember 1997 og eftir 1. viðgerð tann 18. desember 1997 beint í fíggjarnevndina.

Nevndin hevur viðgjørt málið, ið snýr seg um at býta skattin, sum peningastovnar, tryggingarfeløg og vinnurekandi grunnar koma at gjalda, millum tær einstøku kommununar í mun til fólkatalið í kommununum.

Ein samd nevnd teknr undir við uppskotinum og mælir tinginum til at samtykkja uppskot landsstýrisins.

2. viðgerð 27. december 1997. Uppskotið samtykt 20-5-0. At uppskotið soleiðis samtykt kundi fara til 3. viðgerð, samtykt 20-5-0.

Sambært § 85 í tingskipanini varð samtykt at víkja frá tíðarfreistini millum 2. og 3. viðgerð 18-0-4.

3. viðgerð 30. december 1997. Uppskotið, sum samtykt við 2. viðgerð, endaliga samtykt 21-4-0.

Løgtingslóg nr. 175, 30. december 1997.
F.L. j.nr. 2540-5/91

49 Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um meirvirðisgjald

Ár 1997, mikudagin 17. december, legði Anfinn Kallsberg, landsstýrismaður, vegna landsstýrið, fram soljóðandi

Uppskot
til
løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um meirvirðisgjald

§ 1.

Í løgtingslóg nr. 136 frá 8. september 1992 um meirvirðisgjald við seinni broytingum verða gjørdar hesar broytingar:

1) Í § 3, stk. 1, litra b verður eftir "leløgum," sett: "herímillum Føroya Jarðagrunni,".
2) Í § 12, stk. 1, litra k verður 2. pkt. orðað soleiðis: "Fiskireiðskapur, sjóklæði, agn, ísur, olja, provjantur, salt, pakkitilfar, kassaleiga, havnagjøld og uppboðssøluavgjøld til fiskifør, sum reka vinnuligan fiskiskap, harumframt søla av kvotum, fiskidøgum og -loyvum.".
3) Í § 12, stk. 1 verður eftir litra k sett:
   "l. Lønir til bygging og umvæling av egnum bústaði.
   m. Ávístan reseptskyldugan heilivág til privatpersónar.
   n. Útleigu av festum og tilhoyrandi ognum hjá Føroya Jarðaráði.
   o. Sølu av seyðakjøti.".

§ 2.

Henda lóg kemur í gildi 1. januar 1998.

Almennar viðmerkingar

Fleiri staðni í samgonguskjalinum verður nevnt tað neyðuga í, at lækka kostnaðarstøði sum heild, at fáa lønsemi aftur í vinnuna, skapa nýggj arbeiðspláss, lækka skattatrýstið, bøta um trupuleikaranr hjá sethúsaeigarunum o.s.v.

Í samgonguskjalinum stendur eisini, fyri "at stimbra virksemið og lækka kostnaðarstigið skal møguleiki verða at differentiera meirvirðisgjaldið, eitt nú viðvíkjandi arbeiðsløunum.

í hesum sambandi verður meirvirðisgjaldið á tænastuvinnuni og smáfeingi lækkað".

Nú verður uppskot lagt fyri tingið við omanfyrinevnda endamáli.

Hetta uppskot skal eisini síggjast, sum ein liður í arbeiðinum móti svørtum arbeiði.

Uppskotið gongur út uppá at frítaka lønir til bygging og umvæling av egnum bústaði frá avgjaldsskyldu.

Sonuleiðis verður meirvirðisgjaldið tikið av sølu av ávístum heilivági og seyðakjøti.

Broytingarnar í meirvirðisgjaldslógini við at taka avgjaldi av lønini koma at kosta landskassanum umr. 6 mió. kr., men av tí at roknað verður við, at nakað verður vunnið inn aftur orsakað av, at svarta arbeiðið minkar, verður mett, at upphæddin verður nakað minni.

Harafturat verða mistu mvg inntøkurnar hjá landskassanum av ávístum heilivági mettar til umleið 10 mió. kr.

Sum heild kann sigast um meirvirðisgjaldslógina, at hon er ein umfatandi lóg, sum grípur inn víða um í okkara samfelagið. Men hóast tað má sigast, at umsitingin av meirvirðisgjaldslógini hevur gingist rættuliga væl. Neyðugt er tó at gera sær klárt, at fleiri undantøkini í lógini verða, fløkturi verður umsitingin, og eftirlitið gerst torførari.

Síðan meirvirðisgjaldslógin kom í gildi, eru fleiri undantøk komin í lógina, og við uppskotnu lógarbroytingini koma so nøkur afturat.

Hóast hetta verður mett, at tað er heint at leggja hetta uppskot fram.

Hvat nr. 2 og 3 viðvíkur fara skipanirnar helst at hava við sær øki fyrisitingarligt arbeiði hjá fyritøkunum. Hetta kemst av, at næstan allar hesar fyritøkur framvegis skulu gera mvg upp til Toll- og Skattstovu Føroya, og tískil í bókhaldinum skulu hava skil á, um arbeiðið kemur undir mvg-fritøku ella ikki.

Toll- og Skattstova Føroya fær beinavegin eina økta arbeiðsbyrði, herundir eina truplari eftirlitsuppgávu.

Tað, sum í stóran mun verður avgerandi fyri, um eitt virksemi kemur undir mvg-fritøku ella ikki, verður eftir uppskotinum um kundin er ein privatpersónur ella ikki. At stovna serligar vinnugreinir á hesum grundarlagi brytur við logikkin í verandi skipan.

Fyri vinnuna fer skipanin - í tann mun fyrisitingarátreiðslurnar kortini ikki verða øktar - helst at verða til fyrimuns. - Skipanin tryggjar tó ikki, at prísirnir lækka.

Viðmerkingar til tær einstøku broytingarnar
Ad 1). Føroya Jarðarráð, sum er grunnur undir Føroya Landsstýri, umsitur landsjørðina og harvið festini og ognir tess.

Tá bygt verður á festini, byggir landið fyri egna rokning og fyri pening úr Jarðargrunninum, fyri síðani at leiga festið við ognum til bóndan.

MVG-viðurskiftini í hesum førumum eru tey, at Føroya Jarðargrunnur er at rokna sum rekandi útlátsvirksemi, og er tí ikki MVG-skyldigur. Hann kann tí ikki rokna MVG av festileigunni, og kann sostatt heldur ikki fáa inngangandi MVG aftur í samband við bygging.

Um Føroya Jarðargrunnur lat seg skráseta sjálvhoðið fyri bygging og útleigan, skuldu teir kravt MVG av leigunni til festaran, men kundi hinvegin fingið alt MVG, í samband við bygging av festunum, aftur.

Síðani MVG-lógin kom í gildi í 1993, hava trupulleikar staðist av hesum, tá Jarðargrunnurin hevur roknað festaran at eiga festið og bygningar, og hevur festarin tí gjørt MVG-tokanskap hesum viðvíkjandi og fingið MVG av byggingini aftur, sum so er avleverað til Jarðargrunnin.

Fyri at fáa skil á hesi viðurskifti verður broyting nr. 1 gjørd. Broytingin ger Føroya Jarðargrunn MVG-skyldugan av tænastum og vørum, sum hann sjálvur selur. Við broyting nr. 3) ad litra n verður so sagt, at einki avgjald skal roknast av hesum tænastum sum teir selja.

Hetta merkir, at Føroya Jarðargrunnur sleppir frá at rokna MVG av festileiguni, men tá hann er MVG-skyldigur, fær hann alt MVG aftur í samband við bygging á festunum.

Samanumtikið eru ætlaninar við hesum uppskoti at legalisera verandi mannagongdir.

Ad 2) Broytingaruppskotið hevur til endamáls at dagføra viðurskiftini í samband við latingar til fiskifør, sum reka vinnuligan fiskiskap. Uppskotið miðar ímóti at frítaka kassaleigu, havnagjøld, uppboðssøluavgjøld til fiskifør, sum reka vinnuligan fiskiskap, eins og sølu av kvotum, fiskidøgum og -loyvum fyri MVG.

Ad 3) Litra l) Við hesari skipan verður skotið upp at frítaka lønir til bygging og umvæling av egnum bústaði frá avgjaldsskyldu.

Frítøkan er treytað av, at tann, ið fær húsini bygd ella umvæld, sjálvur eigur húsini, antin einsamallur ella saman við øðrum.

Undir bygging og umvæling kemur eisini umbygging og liðugtgerð.

Umbygging skal skiljast sum, at húsini verða sett í stand, nútímansgjørd ella broytt.

Við liðugtgerð skal skiljast t.d. innrættan av kjallara, lofti ella øðrum parti av húsinum, sum ikki var liðugt innrættaður, áðrenn húsini vórðu tikin í nytslu.

Litra l fevnir umframt um sjálv høvuðshúsini eisini um bygging, umvæling, umbygging og liðugtgerð av hjalli, bilhúsi, girðing, túni og líknandi, sum er á sama grundstykki sum bústaðurin, t.v.s. er at meta sum ein natúrligur partur av bústaðnum. Neyst, boyggjhús o.l, ið ikki er á sama grundstykki sum bústaðurin, kemur ikki undir regluna.

Lønir til umvæling o.a. av útbúnaði og útgerð, sum vanliga hoyra til húsini ella ognina annars, sum t.d. hvítvørur, oljufyr og samlet, koma undir hesa reglu, meðan lønir til umvæling o.a. av møblum og øðrum leysafæ, ikki koma undir regluna. Avgerandi er soleiðis, um innbúgvið vildi verið fevnt av pantirættinum, sum partur av tí fasta ognini, ella ikki.

Við egnan bústað er at skilja verandi ella komandi skattligi bústaðurin, t.v.s. miðlepilin fyri lívsháttargrundlagnum.

Tað er í samband við MVG-frítøku uttan týdning, um bústaðurin eisini verður nýttur til annað enn bústað.

Litra m) Reglan fevnir um heilivág til einstaklingar sambært resept, sum er útskrivað av lækna ella tannlækna.

Litra n) Víst verður til viðmerkingarnar hesum viðvíkjandi undir nr. 1.

Litra o) Miðað verður við uppskotinum ímóti at frítaka sølu av seyðakjøti fyri MVG.

Fyri ikki at koma í stríð við gjørdar sáttmálar, t.d. grein 20 í sáttmálanum millum Europeiska Felagsskapin øðrumegin og Ríkisstjórn Danmarkar hinumegin, og við hesum § 55 í løgtingslóg um stýrisskipan Føroya, verður neyðugt at tulka hesa reglu sum eisini fevnandi um MVG í samband við innflutning í tann mun Føroyar eru bundnar til tess sambært gjørdar sáttmálar.

1. viðgerð fríggjadagin 19. december 1997. Uppskotið varð beint í fíggjarnevndina, sum tann 22. december legði fram soljóðandi

Álit

Málið er lagt fyri løgtingið 16. desember 1997 og eftir 1. viðgerð 18. desember 1997 beint í fíggjarnevndina.

Nevndin hevur viðgjørt málið og hevur undir viðgerðini havt fund við landsstýrismannin í skattamálum Anfinn Kallsberg og umboð fyri fíggjar- og skattaumsitingina.

Undir viðgerðini er komið fram, at uppskotið um at frítaka sølu av seyðakjøti fyri MVG er í stríð við handilsavtalur við onnur lond.

Nevndin hevur býtt seg í ein meiriluta (Suni Jacobsen, Eyðun Videro, Ernst Hansen og Finnbogi Arge) og minnilutar.

Meirilutin tekur undir við uppskoti landsstýrisins, men vísandi til omanfyristandani verður sett fram soljóðandi

Broytingaruppskot

Í pkt. 3 verður "o. Søla av seyðakjøti" strikað.

Tordur Niclasen tekur undir við uppskoti landsstýrsins, men hevur annars hesar viðmerkingar:

Tá Fólkaflokkurin v.fl. fyri árum síðan gav føroyingum MVG jólagávuna, kendist hetta sum steinur oman á byrðu hjá mongum húsarhaldi.

20% varð tá lagt oman á el-rokningina, oljurokningina og oman á so mangt, mangt annað. Sjálvt ikki heilivágurin varð undantikin, men gjørdist hesin 20 % dyrari.

Undir sjálvari viðgerðini av MVG-lógini royndu vit áhaldandi at vísa á skeivleikarnar og avleiðingarnar av skipanini, sum ætlanin var at seta í verk.

Hísini varð víst á, hvørjar óhepnar avleiðingar MVG skipanin fór at hava fyri smáfirmaðin.

Men tað var sum at sletta vatn á gás!

Longu fáar dagar eftir, at lógin varð samtykt, høvdu vit uppskot um, at heilivágurin átti at verðið frítikin fyri MVG.

Vit vístu á tær mongu óhepnu avleiðingarnar av, at heilivágurin dyrkaði við 20% - og at tað fór at verða ein asosial skipan, sum fór serliga at raka meint tey, sum frammanundan høvdu trupult við at fáa endarnar at røkka saman.

Hóast uppskot okkara tá ikki fekk nakran meiriluta á tingi, so hildu vit á, og hava síðan ferð eftir ferð víst á nevnda skeivleika.

Tí fegnast vit í dag - og tað gera óivað fleiri saman við okkum - at nú verður MVGið tikið av reseptskyldugum heilivági!

Í viðmerkingum landsstýrsins verður víst til samgonguskjalið, har talan m.a. er um at lækka meirvirðisgjaldið á smáídnaðin.

Undirritaði hevur ilt við at siggja, hvør smáídnaður fer at kenna lætta av hesum uppskoti. Helst man landsstýrið hava ætlað, at hesar viðmerkingar skuldu vera í tí umtalaða uppskotinum, sum var á veg niðan í tingið, men av givnum orsøkum ikki vann vegin fram.

Tá uppskot fólkafloksins um MVG á sinni varð samtykt, gjørdist hetta samstundis "byrjanin til endan" hjá mangari smáfyritøku í landinum - ja, smáídnaðurin fekk av sonnum "eitt skot fyri bógvin."

Tí vil undirritaði heita á landsstýrismannin í MVG-málum at bera so í handi, at smáídnaðurin- og ídnaðurin sum heild fær betri fortreytir at arbeiða undir.

Eingin ivi um, at allur bøti batir, og at hetta uppskot kemur at lætta nakað um hjá fólki kring landið.

Tó er enn langt á mál, at tær mongu familjurnar - serliga barnafamiljurnar - av sonnum koma at kenna ein lætta dagliga húsarhaldinum viðvíkjandi.

Fyri at barnafamiljurnar kundu fingið ein lætta afturat, so hevði tað munað væl, um mjólkin gjørdist bíligari.

Fyri at náa slíkum endamáli átti mjólkin at verðið frítikin fyri MVG.

Landsstýrið hevur í sínum uppskoti undir pkt. o tikið við "sølu av seyðakjøti." Undir 1. viðgerð vóru tað fleiri, ið førdu fram, at neytakjøt átti somuleiðis at komið undir skipanina.

Tí verður skotið upp fylgjandi

Broytingaruppskot

Í pkt. 3) **verður litra o**, orðað soleiðis: "sølu av seyðakjøti, oksakjøti og mjólk".

Jóannes Eidesgaard og Finnbogi Ísakson hava ikki undirskrivað álitið

2. viðgerð 27. december 1997. Broytingaruppskot frá Tordi Niclasen fall 5-4-15. Broytingaruppskot frá meirilutanum í figgjarnevndini samtykt 15-3-5. § 1 soleiðis broytt, samtykt 19-2-2. § 2 samtykt 19-2-2. At uppskotið soleiðis samtykt kundi fara til 3. viðgerð, samtykt 19-2-2.

Samhent § 85 í tingskipanini varð samtykt at víkja frá tíðarfreistini millum 2. og 3. viðgerð 18-0-4.

3. viðgerð 30. december 1997. Løgtingsmenninir Suni Jacobsen, Fyðun Videro, Ernst Hansen, Jóndur J. Niclasen og Finnbogi Arge løgdu fram soljóðandi

Broytingaruppskot

Í pkt. 3) verður litra m orðað soleiðis: "**m.** reseptskyldugan heilivág til fólk".

Viðmerkingar
Upprunauppskotið fevnir bert um ávísan heilivág til privatpersónar og ikki um heilivág, sum verður nýttur innan sjúkrahúsverkið.

Sum er, hevur apotekið heilivágggoymslu á sjúkrahúsunum, har heilivágurin ikki beinleiðis verður MVG skrásettur á hvønn sjúkling sær. Um uppskotið ikki verður broytt, kann hugsast, at sjúkrahúsini fara at áleggja læknunum hesa skrásetingarskyldu fyri at sleppa undan meirvirðisgjaldinum. Vandið er tí fyri, at hetta fer at viðføra stórar umsitingarligar byrðar fyri heilsu- og apoteksverkið.

Broytingaruppskot til pkt. 3 samtykt 21-4-0. Uppskotið, sum samtykt við 2. viðgerð og broytt við 3. viðgerð, endaliga samtykt 19-7-0.

Løgtingslóg nr. 176, 30. december 1997.

F.l. j. nr. 2530-1/91

50 Uppskot til løgtingslóg um setan av stjórnmálanevnd

Ár 1997, mikudagin tann 17. december, legði Marita Petersen, løgtingsmaður, vegna Javnaðarflokkin fram soljóðandi

UPPSKOT
til
løgtingslóg um setan av stjórnmálanevnd

§ 1. Sett verður ein stjórnmálanevnd at kanna og viðgera spurningin um broyting í ríkisrættarligu viðurskiftum Føroya.

§ 2. Stjórnmálanevndin skal hava 13 limir.
Stk. 2. Løgtingið velur 8 limir. Teir skulu vera løgtingsmenn ella fyrrverandi løgtingsmenn. Millum hesar velur løgtingið formann og næstformann.
Stk. 3. Løgmaður tilnevnir tveir landsstýrismenn sum nevndarlimir. Løgmaður kann gera av sjálvur at hava sæti í nevndini í staðin fyri ein landsstýrismann.
Stk. 4. Nevndarlimirnir, sum eru valdir eftir stk 2 og 3, velja aftaná sær 3 nevndarlimir, sum skulu hava hægri útbúgving í samfelagsvísindum og ikki hava sæti á tingi.

§ 3. Stjórnmálanevndin skal:
1. kanna og lýsa verandi ríkisrættarstøðu Føroya.
2. kanna og lýsa, hvørjir karmarnir eru fyri broyting, og hvør formliga broytingarmannagongdin eigur at vera,
3. gera uppskot um nýggja skipan við størri sjálvræði.

Stk. 2. Nevndin hevur harafturat heimild at viðgera allar stjórnmálaspurningar, sum nevndin heldur hava týdning.

§ 4. Nevndin skal seta skrivara, sum skal hava hægri samfelagsvísindaliga útbúgving.
Stk. 2. Skrivarin kann eftir avtalu við formannin taka sær lønta miðhjálp.
Stk. 3. Løgtingsvaldu nevndarlimirnir, sum eru ting-

menn, fáa nevndarsamsýning eftir reglunum í løgtingslóg um samsýning løgtingsmanna. Skrivarin, medhjálp hansara, hinir løgtingsvaldu og teir av nevndini valdu nevndarlimirnir verða løntir eftir nærri avtalu við løgtingsskrivstovustjóran. Løgmaður og landsstýrismaður røkja nevndarstarvið sum partur av vanliga landsstýrisyrki teirra.

Stk. 4. Nevndin fær við hesi løgtingslóg heimild at nýta pening til útreiðslur nevndarinnar, tó í mesta lagi 1,8 mió.kr.

§ 5. Nevndin skal enda arbeiði sítt við áliti og uppskoti í seinasta lagi 1 januar ár 1999.

§ 6. Henda løgtingslóg fær gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

Almennar viðmerkingar

Uppskot at seta stjórnmálanevnd við løgtingslóg at koma við áliti um stýrisskipanarviðurskifti Føroya (hæði í innanhýsis og uttanhýsis høpi) hava ikki fyrr verið sett fram á tingi, tá ið burtursæð verður frá løgtingsmáli nr. 42/1996. Uppskotini, sum hava verið sett fram higartil, hava verið uppskot til samtyktar um samráðingarheimild til løgtingsnevnd ella landsstýrið at tingast við donsku stjórnina um hesi viðurskifti ella ítøkilig broytingaruppskot til heimastýrislógina. Tó setti Jógvan Sundstein, løgtingsmaður í 1985 (løgtingstíðindi 1985 A bls. 31), fram uppskot til samtyktar um at seta tingmannanevnd at endurskoða heimastýrislógina, men hetta uppskot fall á tingi.

Tá landsstýrissamgongan millum Fólkaflokkin og Javnaðarflokkin bleiv skipað í januar 1991, var ein partur av politisku avtaluni millum hesar flokkar at fremja broytingar í ríkisrættarligu viðurskiftum Føroya soleiðis, at sjálvræðið varð munandi víðkað. Tað varð tó heilmanvegin greitt, at løgtingslógirnar um stýrisskipun Føroya í sermálum og um umboðsvald Føroya ikki fóru at verða nóg góðir karmar um fyrisiting av einum munandi øktum sjálvstýri. Sostatt fór landsstýrið fyrst undir at gera uppskot til nýggja stýrisskipanarlóg og setti nevnd at gera tílíkt uppskot. Hetta arbeiðið helt fram, eftir at landsstýrið í apríl 1993 varð umskipað soleiðis, at Tjóðveldisflokkurin og Sjálvstýrisflokkurin komu uppí í staðin fyri Fólkaflokkin.

Stýrisskipanarlógin kom í gildi luttvíst á Ólavsøku 1995 og í sín heild á Ólavsøku 1996. Tá var so hesin parturin av arbeiðinum, sum samgongan setti sær fyri, lokin. Nýval var til løgtingið í juli 1994, og eitt annað landsstýri tók við. Meira bleiv tí ikki gjørt við ætlanina um broyting í ríkisrættarligu støðuni.

Løgtingið setti um mánaðarskiftið november/desember 1997 nevnd samhvørt § 25 í tingskipanini at gera uppskot til setan av stjórnmálanevnd. Úrslitið varð lógaruppskot um tílíka nevnd, løgtingsmál nr. 42/1996. Hetta uppskot vann ikki frama á tingi.

Støðan hjá politisku flokkunum, tá tað snýr seg um spurningin sjálvstýrisamband, kann bólkast í trýggjar høvuðsleiðir:

* Varðveitan av verandi skipan
* Størri sjálvræði innan ríkisfelagsskapin
* Tjóðveldi

Javnaðarflokkurin heldur, at vit nú eiga at finna eina felags støðu til hesar spurningar, í hvussu so er eina støðu, sum ein stórur meirluti á løgtingi kann verða samdur um.

Tí leggur Javnaðarflokkurin nú fram uppskot um stjórnmálanevnd fyri at fáa til vega tað best møguliga grundarlagið at taka støðu á.

Hetta uppskotið víkir frá uppskotinum í løgtingsmáli nr. 42/1996 á tann hátt, at tað er ikki álagt nevndini at gera fleiri uppskot, men einans at gera uppskot til nýggja skipan við størri sjálvræði. Haraftrat er í hesum uppskoti ikki beinleiðis álagt nevndini at endurskoða stýrisskipanarlógina og løgtingsvallógina. Hetta kann nevndin gera, um hon heldur tað vera neyðugt í sambandi við arbeiðssetningin.

Broytingar í ríkisrættarligu skipanini kunnu ikki einvíst fremjast av føroyska löggávu- og umsitingarvaldinum. Men áðrenn nakrar samráðingar kunnu fara fram við donsku stjórnina, eigur Føroya løgting at hava

eina breiða og greiða støðu til, hvørja leið vit vilja halda. Uppgávan hjá stjórnmálanevndini er í stuttum at fáa til vega tað best møguliga grundarlagið at taka støðu á.

Javnaðarflokkurin heldur, at ein nýggj skipan eigur at áseta í minsta lagi:

1) At Danmark og Føroyar hvør sær eru sjálvstøðugar tjóðir
2) At føroyskur heimarættur verður greitt formuleraður
3) At ríkisfelagsskaparin byggir á sáttmála ímillum hesar tjóðir, og at hesin sáttmáli kann uppsigast av báðum pørtum.
4) Føroyar hava fult málsræði á øllum málsøkjum, sum í dag eru sermál, og kunnu við føroyskari lóg taka fult málsræði á málsøkjum, sum nú eru felagsmál, tó so at hetta ikki skal vera galdandi fyri mál, sum mugu vera felagsmál, um talan skal vera um ríkisfelagsskap yvirhøvur.
5) At dómsvald, løgregla og ákæruvald og tóggávan á hesum økjum í tann mun, tað ikki er ósambæriligt við ríkisfelagsskapin, verða yvirtikin sum ein náttúrligur liður í føroyskum sjálvstýri.
   Tá álitið er liðugt, eigur tað at verða prentað og almannakunngjørt.

Viðmerking til einstøku greinirnar

Ad § 1.

Her verður høvuðsmál lógarinnar sett.

Ad. § 2.

Nevndin eigur at verða sett soleiðis saman, at hon hevur limir við bæði politiskum innliti og royndum, soleiðis at løgtingið sjálvt er best umboðað.

Útinnandi valdið eigur at verða væl umboðað. Tí verður skotið upp, at tveir landsstýrismenn ella løgmaður og ein landsstýrismaður eru limir í nevndini.

Sum serligur stuðul hjá nevndini verður skotið upp, at teir av løgtinginum og landsstýrinum valdu nevndarlimirnir aftarat sær skulu velja triggjar nevndarlimir, sum eru fakligа útbúnir á teimum málsøkjum, sum nevndararbeiðið fer at snúgva seg um.

Ad § 3.

Í hesi grein verður ásett, at stjórnmálanevndin skal lýsa verandi skipan við fyrimunum og vansum. Saman við hesum hongur eisini spurningurin um, hvønn týdning ríkisstuðulin hevur fyri føroyska samfelagið.

Við hesum sum grundarlag skal stjórnmálanevndin gera uppskot til eina nýggja skipan við størri sjálvræði. Nevndin er ikki, sum í løgtingsmáli nr. 42/1996, bundin til at gera fleiri uppskot. Um so er, at nevndin heldur, at fleiri møguleikar eru, kann hon gera alternativ uppskot.

Ad § 4.

Tað verður mett, at skal nevndararbeiðið gerast til lítar, má fastur skrivari setast í fulltíðarstarv við skrivstovuhjálp.

Kostnaðurin av nevndararbeiðinum verður leysliga mettur til 1,8 mió. kr., um arbeiðið varir eitt ár, og 40 nevndarfundir verða hildnir. Mettu útreiðslurnar kunnu útgreinast soleiðis:

Skrivari		kr. 500.000
Skrivstovuhald og ymsar útreiðslur		kr. 300.000
Fundarpeningur		
Løgmaður og landsstýrismaður	kr. 0	
Løgtingsmenn	kr. 200.000	
serkønir nevndarlimir	kr. 200.000	kr. 400.000

Serkøn hjálp, eitt nú responsum frá statsrættarserkønum og frágreiðingar um freintmandar stýrisskipanir og fíggjarligar útgreiningar	kr. 400.000
Prenting av áliti	kr. 200.000
Kostnaður til samans	kr. 1.800.000

Að § 5.
Av týðningi er, at ein endalig frest verður sett fyri arbeiðinum, soleiðis at nevndin, tá hon fer undir starv sítt, sum eitt av tí fyrsta leggur eina tíðarætlan soleiðis, at arbeiðið kann gerast liðugt til ásettu tíðina og setir av neyðugu orkuna til arbeiðið.

1. viðgerð 23. januar 1998. Uppskotið beint í nettarnevndina.

Málið fall burtur sbr. stýrisskipanarlógini § 15 stk. 3, tí at løgtingsval var 30. apríl 1998, og málið ikki var liðugt viðgjørt á tingi fyri valið.

51 Uppskot til løgtingslóg um barna og ungdómstannrøkt

Ár 1997 mánadagin 22. desember legði Kristian Magnussen, landsstýrismaður, vegna landsstýrið fram soljóðandi:

Uppskot
til
løgtingslóg um barna- og ungdómstannrøkt

§ 1. Henda lóg um tannrøkt er givin út sambært § 1 í "lov nr. 316 af 17. maj 1995 om sundhedsvæsenet på Færøerne".

§ 2. Kommunustýrið skal tryggja øllum børnum og ungum undir 16 ár, sum búgva í kommununi, møguleika fyri ókeypis fyribyrgjandi og viðgerðandi tannrøkt.
Stk. 2. Reglur um vavið av og krøv til kommunalu tannrøktina sambært stk. 1 verða ásettar av landsstýrismanninum í heilsumálum.
Stk. 3. Landsstýrismaðurin í heilsumálum hevur heimild til at seta í gildi danskar fyriskipanir um vavið av og krøv til kommunalu tannrøktina. Hesar fyriskipanir verða ikki kunngjørdar.

§ 3. Tilboð um kommunala tannrøkt verður givið á almennum tannlæknastovum.
Stk. 2. Landsstýrismaðurin í heilsumálum kann í serligum førum góðkenna, at tilboð um kommunala tannrøkt verður givið hjá privat starvandi tannlæknum, sum kommunustýrið ger sáttmála við. Nærri reglur um krøv til góðkenningina verða ásettar av landsstýrismanninum.
Stk. 3. Viðgerðir, ið eru byrjaðar í kommunalu tannrøktini, skulu gerast lidnar har.

§ 4. Landsstýrismaðurin í heilsumálum kann góðkenna, at kommunurnar skipa eina felags kommunala tannrøktarskipan. Landsstýrismaðurin kann áseta nærri reglur um tílíkar felagsskapir.
Stk. 2. Broyting ella avtøka av teimum í stk. 1 nevndu felagsskapum skal góðkennast av landsstýrismanninum.

§ 5. Eitt barn, sum sambært lógini verður viðgjørt í kommunalu barnatannrøktarskipanini, kann verða ávíst til sertannlækna, um tað hevur serligar tannrøktartrupuleikar.

§ 6. Landsstýrismaðurin í heilsumálum hevur heimild til at seta í verk skipanir til samskipan av tannrøktini í kommunalu og privatu tannrøktini.

§ 7. Kommunustýrið skal geva upplýsingar um virksemið sambært hesi lóg eftir reglum ásettar av landsstýrismanninum í heilsumálum.
Stk. 2. Landsstýrismaðurin í heilsumálum skipar fyri, at hagtøl yvir tannlæknanna virksemið verða gjørd. Landskassin ber útreiðslurnar fyri gerð av hagtølunum.

§ 8. Kommununnar bera tær útreiðslur, sum standast av kommunalu tannrøktini sambært § 2.

§ 9. Landsstýrismaðurin í heilsumálum kann góðkenna, at royndarskipanir verða settar í verk viðvíkjandi nýggjum bygnaðar- og viðgerðarhættum, soleiðis at reglurnar í § 2 í hesari lóg kunnu verða frávíktar.

§ 10. Um foreldur ella verji at børnum í kommunalu tannrøktini eru ónøgd við avgerð, sum Kommunustýrið tekur sambært hesi lóg, kunnu tey kæra til Almanna- og heilsumálastýrið innan 4 vikur eftir, at avgerðin er tikin.
Stk. 2. Landsstýrismaðurin í heilsumálum kann síggja burtur frá kærufreistini, tá ið serlig viðurskifti gera seg galdandi.
Stk. 3. Landsstýrismaðurin í heilsumálum kann áseta, at heimildin hjá landsstýrismanninum eftir stk. 1 verður løgd til eina kærunevnd.

§ 11. Hendan lóg kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

Almennar viðmerkingar
Endamálið við barnatannrøktarlógini er, at fólkið, við at fáa eitt samanhangandi tilboð um fyribyrging og viðgerð, kann menna hóskandi tannrøktarvanar og sunnar tenn, munn og kjálkar og halda hesi á einum góðum støði alt lívið.

Tørvur hevur leingi verið á at dagføra føroysku lógina um kommunala barnatannrøkt. Í núverandi lóg eru øll børn í undirvísingarskylduga aldrinum umfatað av tí ókeypis viðgerandi og fyribyrgjandi tannrøktarskipanini. Men í dag hava 44 út av 49 kommunum í Føroyum víðka kommunala tannrøktartilboðið frá 7-14 ár til 0-16 ár. Í flestu kommunum verður tannrøktartilboðið givið á almennum tannlæknastovum. Í flestu førum eru tleiri kommunur felags um eina almenna tannlæknastovu. Sandavágur, Skúvoy og ávísar kommunur í Eysturoynni og Streymoynni hava tó fingið undantaksloyvið frá landsstýrinum til at røkja kommunalu tannrøktaruppgávuna á privatum tannlæknastovum. Hesar kommunur hava undirskrivað sáttmálar við Føroya Tannlæknafelag og privat starvandi tannlæknar, sum tryggja øllum børnum frá 0-16 ár ókeypis fyribyrgjandi og viðgerandi tannrøkt. Sáttmálarnir ganga yvir eitt ávíst áramál, men ventandi er tannrøktin fult útbygd um umf. 4 ár.

Galdandi lóg um tannrøkt er sostatt ikki nútíðarhóskandi. Høvuðsendamálið við hesum lógaruppskoti er tí, at kommunala tannrøktartilboðið verður víðkað soleiðis, at øll børn frá 0-16 ár í landinum verða tryggjaði ókeypis viðgerandi og fyribyrgjandi tannrøkt.

Tennirnar krevja røkt frá barnsins fyrsta degi, og tí er tað umráðandi, at foreldur og børn fáa ráð og leiðbeining um kost, tannrøkt, sutthuvanar og annað tílíkt so tíðliga sum gjørligt. Hetta førir við sær, at tannheilsan verður munandi betri, at viðgerðartørvurin so líðandi verður minni, og at vit fáa færri skeivar tenn vegna í ótíð trektar barnatenn.

Í galdandi donsku lóggávuni um tannrøkt gera kommununar sjálvar av, um tær geva tilboð um kommunala tannrøkt á almennari ella privatari tannlæknastovu. Í Føroyum virkar tann kommunala tannrøktarskipanin væl, sum hon er í dag. Sum nú er, eru flestu kommunur felags um almennar tannlæknastovur. Um so er, at tað verður valfrítt fyri kommununar, um tilboðið verður givið á almennum ella privatum tannlæknastovum, kann vandi verða fyri, at summar kommunur taka seg burturúr teim felags skipanunum og velja at hava tannrøktina privata. Hetta kann skaða tað samlaðu skipanina, og gera skipanina dyrari fyri tær einkultu kommununar. Tí verður høvuðsreglan í lógaruppskotinum sum áður, at kommunala tannrøktartilboðið skal gevast á almennum tannlæknastovum.

Kommununum bera útreiðslurnar av kommunalu tannrøktini. Viðkanim av kommunala tannrøktartilboðnum fer møguliga at geva kommununum støri útreiðslur til tannrøkt í eina tíð, men um hugsa verður um framtíðina, er talan um umlegging av arbeiðinum. Tá ið støri dentur verður lagdur á tað fyribyrgjandi arbeiði áðrenn skúlaaldur, fáa færri børn ringar tenn í skúlaaldri. Sostatt verða færri útreiðslur til viðgerðir, sum eru tær mest útreiðslukrevjandi. Harumframt eru tað bert nakrar fáar kommunur í Føroyum, sum fáa meirútreiðslur av lógaruppskotinum, av tí at tær flestu kommununrnar í Føroyum longu hava framt smáharnatannrøkt frá 0-16 ár.

Støðið undir omanfyristandandi lógaruppskoti er danska "lovbekendtgørelse nr. 411 af 26. maj 1994 af lov om tandpleje".

Lógin er ein minimumslóg, t.v.s., at kommununrnar skulu tryggja borgarunum tey tilboð, sum nevnd eru í lógini, men ynskja kommununrnar at geva sínum borgarum betri tilboð enn ásett er í lógini, er hetta altíð møguligt.

Uppskotið hevur verið til hoyringar hjá Føroya Kommunufelag, Tórshavnar Býráð, landslæknarum, Føroya Barnaheim, Føroya Tannlæknafelag, tannteknikkarum og tannrøktarum í Føroyum.

Tórshavnar Býráð, landslæknin, Føroya Barnaheim, Føroya Tannlæknafelag, tannteknikkarar og tannrøktarar í Føroyum taka undir við, at lógin í verandi líki verður sett í gildi í Føroyum. Føroya Kommunufelag metir, at kommununrnar sjálvar eiga at gera av, um barnatannrøktarskyldur teirra verða útintar á kommunalum tannlæknastovum ella hjá tannlæknum sum arbeiðstakarar fyri kommununa. Kommunufelagið metir eisini, at kommununrnar sjálvar skulu avgerða, um tær skulu innganga í felags kommunalar tannrøktarskipanir.

Serligar viðmerkingar

Ad. § 1) Í lóg nr. 316 frá 17. juni 1995 om sundhedsvæsenet på Færøerne hevur føroyska heimastýrið fingið heimild til at gera føroyskar lóggávur innan heilsuøkt, m.a. skal føroyska heimastýrið gera nýggja tannrøktarlóg.

Ad. § 2) Við hesari grein verður økt hjá kommunalu tannrøktini økt, soleiðis at hørnini í staðin fyri at fáa tilboð um kommunala tannrøkt frá tí tey eru 7-14 ár, sum í galdandi skipan, fáa tilboðið frá tí tey eru 0-16 ár. Talan er um eitt tilboð, sum borgarin ikki nýtist at taka ímóti.

Barna- og ungdómstannrøkt er fyrsta liðið í einum samanbangandi tannrøktartilboði frá tí eitt er barn til ein verður vaksin. Frá 0-2 ára aldur skal barnatannrøktin fyrst og fremst ráðgeva foreldrum viðvíkjandi mati og tannheilsu. Hendan uppgávan eigur í mestan mun at verða útint í samstarvi við tey heilsustarvsfólk, sum eisini eru um barnið.

Ad. § 2, stk. 2) Landsstýrismaðurin í heilsumálum ásetur nærri reglur um vavið og krovini til kommunalu tannrøktina við kunngerð. Við kunngerð verður m.a. ágreinað, hvat meint verður við "økeypis fyribyrgjandi og viðgerðandi tannrøkt".

Ad. § 2, stk. 3) Ætlanin við hesum stykki er, at tá ið nýggj reglusskriv, stevnumið, vegleiðingar o.a. verða gjørdar av donsku heilsumálaráðharranum ella donsku heilsustýrinum fyri at skoyta uppí ella dagføra kommunalu tannrøktarskipanina, kann landsstýrismaðurin seta hesar í gildi í Føroyum. Talan kann eisini verða um at seta donskar reglur í gildi í Føroyum, tá ið talan er um ger av fakligum reglum, sum eisini verða mettar at hóska tíl føroysk viðurskifti. Hesar reglur verða ikki kunngjørdar, men verða av Almanna- og heilsumálastýrinum sendar teimum viðkomandi.

Ad. § 3) Høvuðsreglan í hesi lóg er, at tilboð um kommunala tannrøkt verður givin á almennum tannlæknastovum. (Sí omanfyri í almennu viðmerkingunum). Við eina almenna tannlæknastovu er at skilja eina

tannlæknastovu, sum er í hølum, ið kommunan eigur ella hevur leiga til endamálið og har kommunan hevur sett tannlæknar og annað starvsfólk til at røkja kommunalu tannrøktaruppgávuna.

Ad. § 3, stk. 2) Landsstýrismaðurin kann sambært hesi grein góðkenna, at kommunustýrið ger sáttmála við privat starvandi tannlæknar um at reka kommunalu tannrøktina.

Við ein privat starvandi tannlækna er at skilja ein tannlækna, sum sjálvstøðugt arbeiðir sum tannlækni á egnari tannlæknastovu. Tannlæknastovan skal lúka tey krøv, ið verða sett til innrætting og rakstur av tannlæknastovum. Tannlæknin setur onnur starvsfólk á tannlæknastovuni.

§ 3, stk. 2 er orðað meira smidligt enn í núverandi lóggávu, har landsstýrismaðurin bert í serligum førum kann góðkenna royndarskipanir, har kommunala tannrøktin verður løgd til privat starvandi tannlæknar. Í galdandi lóg skulu royndarskipanirnar vara í mesta lagi 3 ár.

Landsstýrismaðurin skal í framtíðini meta, um tað er mest hóskandi at kommunala tannrøktin hjá einari ávísari kommunu verður løgd hjá privat starvandi tannlækna. Hetta kann m.a. verða, tá ið kommunurnar meta tað verða ov dyrt at byggja tannlæknastovu og seta tannlæknar. Kravið til um ein fær góðkenning má verða, at kommunustýrið kann prógva ella gera sannlíkt, at skipanin ikki gerst dýrari í rakstri og samstundis eins væltvirkandi og tryggjandi og tannrøktin á almennum tannlæknastovum.

Um mett verður, at tannrøktin á almennu tannlæknastovuni virkar fullvæl í tí kommununi, sum søkir um loyvið til at leggja kommunalu tannrøktina hjá privat starvandi tannlækna, eigur loyvið ikki at verða givið.

Ad. § 3, stk. 3) Hetta stykki skal tryggja, at børn sum verða viðgjørd í kommunalu tannrøktarskipanini, skulu liðugtviðgerast har. Her verður t.d. hugsað um 16-ára gomul børn, sum eru á veg út úr skipanini. Um hesi fylla 17 ár meðan tey eru í viðgerð, skal viðgerðin, sum tey eru í holt við, gerast liðug í kommunalu tannrøktini.

Ad. § 4, stk. 1) Hendan grein er líkin úr galdandi kongiligari fyriskipan um barnatannrøkt í Føroyum. Mett verður, at tað er neyðugt í Føroyum at hava eina tílíka grein, eftirsum kommunurnar í Føroyum eru nógv minni enn kommunurnar í Danmark og at tað tí er mest hóskandi, at kommunur eru felags um almennar tannlæknastovur.

Ad. § 4. stk. 2) Tá ið landsstýrismaðurin hevur avgjørt, at ávísar kommunur skulu verða felags um eina kommunala tannrøktarskipan, er tað neyðugt, at landsstýrismaðurin eisini góðkennir broytingar ella avtøku í hesum felagsskapum.

Ad. § 5, stk. 1) Tá ið einum barni tørvar serliga tannrøktarviðgerð, sum ikki kann verða gjørd í kommunalu tannrøktini, kann tannlæknin í kommunalu skipanini ávísa barninum til sertannlækna. Fakliga metingin av, um barni hevur serligar tannrøktartrupuleikar, verður gjørd av tannlæknanum í kommunalu skipanini.

Ad. § 6) Ætlanin við hesari grein er at tryggja, at tey úrslit, sum barna- og ungdómstannrøktin eru komin, til verða førd víðari, soleiðis at landsstýrismaðurin tryggjar eina aktiva samskipan ímillum barna- og ungdómstannrøktina og vaksnamannatannrøktina. Sum partur av hesum arbeiði skal tryggjast ein virkin yvirføringsskipan ímillum báðar tannrøktarskipanirnar. Landsstýrismaðurin kann umhugsa at seta líknandi skipanir í verk, sum danska heilsustýrið hevur sett í verk ella í framtíðini setur í verk í Danmark.

Ad. § 7, stk. 1) Landsstýrismaðurin í heilsumálum ásetur reglur um innlating av upplýsing sambært hesi lóg. Upplýsingarnir kunnu tæna sum eitt eftirlitsamboð fyri landsstýrismannin.

Ad. § 7, stk. 2) Landsstýrismaðurin fyriskipar, at hagtøl verða gjørd yvir tannlæknanna virksemi. Hann kann

áleggja ávísum persónum at gera hagtølini sína vegna. Hagtølini, tær sokallaðu OCR-frágreiðingarnar, verða eisini eitt eftirlitsamboð fyri landsstýrismannin. Landsstýrismaðurin kann t.d. biðja eina kommunu um frágreiðing, um hagtølini hjá einari kommunu vísast vánaligari enn hagtølini hjá øðrum kommunum.

Føroya Tannlæknafelag hevur í nógv ár givið út OCR-frágreiðingar við hagtølum yvir tannrøkt í Føroyum. Felagið samlar inn upplýsingar frá øllum kommununum, og ger frágreiðingina. Men verður, at útreiðslan fyri hagtalsfrágreiðingarnar eigur at liggja hjá landsstýrismanninum, eftirsum tað er hann sum fyriskipar, at hagtøl verða gjørd til sína nytslu. Útreiðslan fyri hagtalsfrágreiðingarnar er uml. 7.000,- til 12.000,- kr. pr. ár.

Ad. § 8) Kommunurnar bera útreiðslurnar í sambandi við, at børn og ung undir 16 ár fáa ókeypis viðgerandi og fyribyrgjandi tannrøkt. (Sí omanfyri í almennu viðmerkingunum).

Ad. § 9) Tað tryggjar eina ávísa smidligheit í skipanini, at landsstýrismaðurin í heilsumálum kann seta royndarskipanir í verk.

Ad. § 10) Við hesari grein verður møguleiki hjá foreldrum ella verjum at børnum í kommunalu tannrøktini at kæra um avgerðir, sum kommunustýrið tekur sambært hesi lóg.

Ad. § 11) Eftir hesi grein fær lógin gildi dagin eftir, hon er kunngjørd.

1. viðgerð fríggjadagin 16. januar 1998. Uppskotið varð beint í trivnaðarnevndina, sum fríggjadagin 13. februar 1998 legði fram soljóðandi

Álit

Málið er lagt fram av landsstýrinum 22. desember 1997 og eftir 1. viðgerð 16. januar 1998 beint í trivnaðarnevndina.

Nevndin hevur viðgjørt málið á fundum 22. januar, 2 februar og 6. februar 1998.

Undir viðgerðini hevur nevndin hildið fund við umboð fyri tannlæknafelagið, býarfelagið landsstýrismannin í heilsumálum og fultrúan í tannrøktarmálunt. Kommunufelagið, sum eisini var boðið á fund við nevndina, møtti ikki.

Landsstýrismaðurin er komin við eini rættleiðing til viðmerkingarnar til uppskotið Ad. § 3, stk. 3. Har skal "16" av røttum verða "15" og "17" skal verða "16".

Ein samd nevnd tekur undir við uppskotinum, tó við teirri broyting, at § 2 stk. 3 verður strikað, og at orðini "í serligum førum" í § 3, stk. 2 verða strikað. Hentrik Old tekur tó ikki undir við seinnu broytingini.

Grundgevingin fyri broytingaruppskotinum er, at nevndin ikki heldur, at spurningurin um, hvussu lógatilfar eigur at verða tilevnað og kunngjørt, eigur at verða ásettur í serlóggávuni, men í heildarhøpi sbr. løgtingslóg nr. 109 frá 17.12.1987 um alment kunngerðablað. Grundgevingin fyri seinnu broytingini er, at hildið verður, at kommunurnar, sum bera allan kostnaðin av skipanini, fær stórri rásarúm við broyttu orðingini.

Samsvarandi hesum verður sett fram soljóðandi:

Broytingaruppskot

1) 1) § 2, stk. 3 verður strikað.
2) Í § 3, stk. 2 verða orðini "í serligum førum" strikað.

2. viðgerð týsdagin 17. februar 1998. Broytingaruppskot til § 2 samtykt 26-0-0.§ 2 soleiðis broytt samtykt 27-0-0. Broytingaruppskot til § 3 samtykt 24-1-2. § 3 soleiðis broytt samtykt 23-2-1. §§ 1 og 4 til og við 11 samtyktar 27-0-0. At uppskotið soleiðis samtykt kann fara til 3. viðgerð samtykt 27-0-0.

3. viðgerð friggjadagin 20. februar1998. Uppskotið, sum samtykt við 2. viðgerð, endaliga samtykt 21-0-0.

Løgtingslóg nr. 23 frá 06.03.1998

F.L.j.nr. 950-4/90

52 Ikki brúkt

53 Ikki brúkt

54 Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um minstuløn og dagstudning

Ár 1998, mikudagin 14. januar, legði Jørgen Niclasen, løgtingsmaður, vegna seg sjálvan og løgtingsmenninar Jákup Joensen, Óla Jacobsen, Lassa Klein, Henrik Old. Heina O. Heinesen og Álv Zachariasen, fram soljóðandi:

Uppskot
til
løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um minstuløn og dagstudning

§ 1. Í løgtingslóg nr. 32 frá 27. mars 1992 um minstuløn og dagstudning við seinni broytingum verða gjørdar hesar broytingar:

1) Í § 4 verður talið "427,17" broytt til: "424,17".
2) Í § 5, 1. stk., verða orðini "sum minstaløn er veitt fyri" broytt til: "sum manningin er tryggjað minstuløn".

§ 2. Henda lóg kemur í gildi 30. desember 1997.

Almennar viðmerkingar

Av tí av ógreiða umframt ein roknifeilur hava stungið seg upp í sambandi við seinastu broyting av lógini, verður skotið upp, at lógin verður broytt soleiðis, at hetta verður rættað.

Mælt verður til, at lógin fær gildi aftanvirkandi frá 30. desember 1997, tí verandi orðingin av lógini varð samtykt.

Serligar viðmerkingar

ad. 1) Ein roknifeilur hevur viðført, at tað í § 4 í lógini er komið at standa, at minstaløgin er kr. 427,17 um dagin. Tað rætta talið er kr. 424,17, ið er 1/30 av mánaðarminstaløgini upp á kr. 12.725,-.

ad. 2) Tað hevur vist seg, at verandi orðingin av lógini kann skiljast soleiðis, at dagstudningur beri verður latin til minstuløgnartúrar. Tað hevur ikki verið ætlanin, og kann hetta váttast av almennu viðmerkingunum til løgtingsmál nr. 42/1997, sum er uppskot landsstýrisins til broyting í hesi lóg.

Fyri at sleppa undan ivamálum verður mælt til at broyta uppskotið, sum omanfyri tilskilað.

1. viðgerð týsdagin 20. januar 1998. Uppskotið varð uttan nevndarviðgerð beint til 2. viðgerð.

2. viðgerð 23. januar 1998. Uppskot frá Jørgen Niclasen um at beina uppskotið í nevnd samtykt 25-2-2. Uppskotið beint í vinnunevndina, sum við framhaldandi 2. viðgerð týsdagin 27. januar 1998 legði fram soljóðandi

Álit

Málið varð lagt fyri løgtingið av Jørgen Niclasen, Jákup Joensen, Óla Jacobsen, Lassa Klein, Henrik Old, Heina O. Heinesen og Álvi Zachariasen 12. januar 1998 og eftir 2. viðgerð 23. januar 1998 beint í vinnunevndina.

Vinnunevndin hevur viðgjørt uppskotið og hevur undir viðgerðini havt fund við landsstýrismannin í fiskivinnumálum.

Landsstýrismaðurin hevur upplýst fyri nevndini, at hóast tað, at uppskotið verður samtykt, so vísa forsagnir, at fíggjarkarmurin á fíggjarlógini 1998 kemur at halda. Ein samd nevnd tekur undir við uppskotinum, tó heldur nevndin, at hóskiligari er, at avtrappingin av dagstudningunum í § 5, stk. 3, verður 55 % í staðin fyri 45 % fyri at tryggja, at størri sannlíkindi eru til, at játtanin á fíggjarlógini kemur at halda.

Vísandi til omanfyristandandi setir nevndin fram soljóðandi

Broytingaruppskot

Í § 1 verður sett inn sum nýtt 3):
"3) Í § 5, stk.3, verður í tveimum førum "45" broytt til "55".

Broytingaruppskot frá vinnunevndini til § 1 samtykt 15-3-0, § 1 soleiðis broytt samtykt 16-2-0, § 2 samtykt 15-3-0. At uppskotið soleiðis samtykt kann fara til 3. viðgerð samtykt 15-3-0.

Uppskot frá tinganonnunum Jørgen Niclasen, Óla Jacobsen, Kjartan I. Joensen, Jákup Olsen, Henrik Old og Tordi Niclasen um frávik frá tíðarfreistini millum 2. og 3. viðgerð samboeri § 85 samtykt 18-0-0.

3. viðgerð 29. januar 1998. Uppskotið sum samtykt við 2. viðgerð endaliga samtykt 18-2-0.

Løgtingslóg nr. 12 frá 5. februar 1998.

55 Ikki brúkt

56 Nýval av nevndum

Á ri 1998, 20. januar, legði Marita Petersen, løgtingsmaður, vegna løgtingsmeninar Jóannes Eidesgaard, Heina O. Heinesen, Helenu Dam á Neystabø, Tord J. Niclasen og Luitjen Apol fram soljóðandi:

Uppskot
til
samtyktar

Løgtingið samtykkir, at løgtingsnevndirnar, sum eru umrøddar í § 24 í tingskipanini, verða valdar av nýggjum

Viðmerkingar
Luitjen Apol, sum hevur tikið sæti á tingi fyri Ernst Hansen, sála, varamann á tingi fyri Kristian Magnussen, hevur boðað frá, at hann ikki styðjar samgonguna. Valbólkurin hjá samgonguni er sostatt farin úr 18 niður í 17 limir, og meta uppskotsstillararnir, at nevndarval eigur at verða av nýggjum, soleiðis at býtið av nevndarsessum verður í samsvar við talið av løgtingslimum í hvørjum av valbólkunum.

1. viðgerð 23. januar 1998. Uppskotið varð uttan nevndarviðgerð beint til 2. viðgerð.

2. viðgerð 4. februar 1998. Uppskotið fall 13-0-17.

57 Uppskot til Løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um "studentaskúlar v.m."

Ár 1998, fríggjadagin 23. januar, legði Tordar J. Niclasen, løgtingsmaður, vegna Miðflokkin fram soljóðandi:

U p p s k o t
til
løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um "studentaskúlar v.m."

§ 1.

Í løgtingslóg nr. 106 frá 29. juni 1995 um studentaskúlar v.m., sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 55 frá 13. mai 1997, verður aftaná § 8 sett inn nýggj § 8a, sum verður soljóðandi:

"§8a Mest loyvda nemingatal í hvørjum flokki er 24.

Stk. 2. Í serligum førum kann landsstýrið loyva undantak frá ásetingini í stk. 1. Undantak kann bert verða loyvt eftir samtykki frá lærararáðnum.

§ 2.

Henda lóg kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

Viðmerkingar

7. januar sendi Miðflokkurin løgmanni skriv, har heitt var á hann um at taka neyðug stig til, at HF- og studentaskúlanæmingar sum skjótast kundu fara aftur í skúla.

Løgmaður hevur ikki svarað, og eingi er frætt um, at hann hevur tikið stig til at fáa málið loyst.

Tað er okkara áskoðan, soleiðis sum vit eisini vístu á í brævinum til løgmann, at tá landsstýrismaður ikki megnar ella vil loysa eitt átrokandi mál, ja so er tað ábyrgd og skylda løgmans at taka neyðug stig.

Fyri hvønn dag, ið gongur, verða møguleikar næmingarna fyri at koma igjøgnum tað neyðuga pensumið minnandi skerdir. Hetta kann í ringasta føri hava við sær, at prógvtøkan ikki kann nást til ásettu tíðina og fer at føra við sær, at føroyskir næmingar fáa eitt verri útgangsstøði fyri framhaldandi lestri eftir lokið prógv.

Hetta er ein ótolandi støða fyri næmingarnar, og má tí nú eitt avgerð takast, sum fyribyrgir nevndu óhepnu avleiðingum.

Tá tað er heilt órímiligt og ábyrgdarleyst, at HF- og studentaskúlanæmingar nú á triðju viku skulu vera gíslar í hesum stríði, síggja vit ikki nakra aðra gongda leið, enn at lata tingið tulu í hesi søk.

Sparingin, ið landsstýrismaðurin hevur sagt vera neyðuga, er longu gott og væl vunnin við spardum løntútreiðslum undir verkfallinum.

Fíggjarligu fortreytirnar eru sostatt longu til staðar hjá landsstýrismanninum at fáa málið loyst.

Endamálið við hesi lógarbroyting er at fáa ásett mest loyvdu talið av næmingum, ið kunnu vera í hvørjum flokki/bólki á studentaskúlum og HF-skeiðum í landinum.

Í 1992 varð avtala gjørd millum landsstýrið og Yrkisfelag Studentaskúla- og HF-lærara um, at ikki fleiri enn 24 næmingar kundu vera í hvørjum flokki.

Hóast ymist hevur ljóðað, hvørt avtalan er í gildi ella ei, so má ásannast, at júst nevnda avtala boðar frá, at báðir partar hava hildið, tað ikki vera ráðiligt, at fleiri enn 24 næmingar vóru í hvørjum flokki.

Vit meta, at 24 næmingar eru enntá í hægra lagi fyri gagnligum arbeiðsviðurskiftum í flokkinum, og fyri at varðveita dygdina í einl undirvísing, har rúm eigur at vera bæði fyri heildini og einstaklinginum í flokkinum.

Hvat møguligum meirkostnaði viðvíkir, kann sigast, at sum skipanin hevur verið umsitin til d.d., fer broytingin ikki at hava meirútreiðslur við sær, tí eingin flokkur/bólkur hevur verið størri enn 24 næmingar.

Annars liggur kostnaðurin av hvørjum flokki um kr. 450.000,- árliga.

Vónandi verður uppskotið samtykt, soleiðis at næmingarnir sum skjótast sleppa aftur í skúla, og at spurningurin um mest loyvda næmingatal í hvørjum flokki/bólki ikki framhaldandi gerst ein tulkingarspurningur og stríð um orð (avtalur) partanna millum.

1. viðgerð týsdagin 27. januar 1998. Uppskotið var beint í mentanarnevndina, sum tann 20. februar 1998 legði fram soljóðandi

Álit

Málið er lagt fram av Miðflokkinum 23. januar 1998 og eftir 1. viðgerð 27. januar 1998 beint í mentanarnevndina.

Nevndin hevur viðgjørt málið og hevur býtt seg í ein meiriluta og ein minniluta.

Meirilutin (Bjarni Djurholm, Lisbeth Petersen, Maria Hansen, Signar á Brúnni, Lasse Klein og Marita Petersen) tekur ikki undir við málinum og mælir løgtinginum frá at samtykkja uppskotið.

Minnilutin (Jenis av Rana) mælir løgtinginum til at samtykka uppskotið, og hevur hesar viðmerkingar.

Uppskotið varð lagt fram í sambandi við ósemjuna millum yrkisfelagið og landsstýrið, sum førdi til, at skúlagongdin á studenta- og HF-skúlum okkara varð niðurløgd í 3 vikur.

Uppskotsstillararnir metta, at neyðugt varð, fyri at tryggja frálæru og prógv næminganna, at løgtingið gjørdi sína ávirkan galdandi, og eingin ivi er um, at hetta var við til at føra partarnar saman aftur, so loysn fekst á ósemjuni longu náttina eftir 1. viðgerðina í løgtinginum.

Í umtalaðu semjuni staðfesta partarnir aftur markið fyri hægsta næmingatalinum, sum ynskt er um - 24 í hvørjum flokki.

Hóast hesa semju er greitt, at hendan er so orðað, at ósemja, lík teirri júst loknu, kann gerast veruleiki aftur. Tí mælir minnilutin til at samtykkja uppskotið, sum er so greitt orðað, at eingin ivi er um, hvussu avgerðir um flokkastødd skulu takast.

2. viðgerð týsdagin 24. februar 1998. §§ 1 og 2 fullu 4-2-20. Uppskotið fallið.

58 Uppskot til løgtingslót um broyting í løgtingslóg um "skeið til hægri fyrircikingarpróvtøku v.m."

Ár 1998, fríggjadagin 23. januar, legði Tordur J. Niclasen, løgtingsmaður, vegna Miðflokkin fram soljóðandi:

Uppskot
til
løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um "skeið til hægri fyrireikingarpróvtøku v.m."

§ 1.

Í løgtingslóg nr. 107 frá 29. juni 1995 um skeið til hægri fyrireikingarpróvtøku v.m., sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 54 frá 13. mai 1997, verður aftaná § 13 sett ium nýggj § 13a verður soljóðandi:

"§ 13a Mest loyvda næmingatal í hvørjum flokki er 24.

Stk. 2. Í serligum førum kann landsstýrið loyva undantak frá áseting ini í stk. 1. Undantak kann bert verða loyvt sitir samtykki frá lærararáðnum.

§ 2.

Henda lóg kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

Viðmerkinga

Víst verður til viðmerkingarnar í lagtingsmáli nr. 57/1997 um broyting í løgtingslóg um "studentaskúlar v.m.

1. viðgerð týsdagin 27. januar 1998. Uppskotið varð beint í mentanarnevndina, sum tann 20. februar 1998 legði fram soljóðandi.

Álit

Málið er lagt fram av Miðflokkinum 23. januar 1998 og eftir 1. viðgerð 27. januar 1998 beint í mentanarnevndina.

Nevndin hevur viðgjørt málið, og hevur býtt seg í ein meiriluta og ein minniluta.

Meirilutin (Bjarni Djurholm, Lisbeth Petersen, Maria Hansen, Signar á Brúnni, Lasse Klein og Marita Petersen) tekur ikki undir við málinum og mælir løgtinginum frá at samtykkja uppskotið.

Minnilutin (Jenis av Rana) mælir løgtinginum til at samtykka uppskotið, og hevur hesar viðmerkingar.

Uppskotið varð lagt fram í sambandi við ósemjuna millu yrkisfelagið og landsstýrið, sum førdi til, at skúlagongdin á studenta- og HF-skúlum okkara varð niðurlogd í 3 vikur.

Uppskotsstillararnir mettu, at neyðugt varð, fyri at tryggja frálæru og prógv næmingunna, at løgtingið gjørdi sína ávirkan gladandi, og eingin ivi er um, at hetta var við til at føra partarnar saman aftur, so loysn fekst á ósemjuni longu náttina eftir 1. viðgerðina í løgtinginum.

Í umtalaðu semjuni staðfesta partarnir aftur markið fyri hægsta næmingatalinum, sum ynski er um 24 í hvørjum flokki.

Hóast hesa semju er greitt, at henda er so orðað, at ósemja, lík terri, sum nú er loknu, kann gerast veruleiki aftur. Tí mælir minnilutin til at samtykkja uppskotið, sum er so greitt orðað, at eingi ivi er um, hvussu avgerðir um flokkastødd skulu takast.

2. viðgerð týsdagin 24. februar 1998. §§ 1 og 2 fullu 4-1-21. Uppskotið feldið.

59 Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um lærlingaviðurskifti

Ár 1998, týsdagin 27. januar legði Eilif Samuelsen, landsstýrismaður, vegna landsstýrið fram soljóðandi

Uppskot
til
løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um lærlingaviðurskifti

§ 1.

Í løgtingslóg nr. 29 frá 12. oktober 1954 um lærlingaviðurskifti sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 49 frá 2. mai 1995 verður § 4, stk. 1, 3. pkt. orðað soleiðis:

"Landskassin endurrindar læruplássunum lærlingalønina, sum tó ikki kann vera hægri enn ásetta minstalønin fyri handverkslærlingar sambært sáttmála millum Føroya Handverkarafelag og Føroya Handverksmeistarafelag, meðan lærlingurin fær ta til læruna hoyrandi skúlagongd".

§ 2.

Henda lóg kemur í gildi 1. januar 1998.

Stk. 2. Samstundis fer danski teksturin í løgtingslóg nr. 29 frá 12. oktober 1954 um lærlingaviðurskifti sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 49 frá 2. mai 1995 úr gildi.

Viðmerkingar

Við løgtingslóg nr. 49 frá 2. mai 1995 um broytingar í lærlingalógini varð skipanin um at landskassin skuldi endurrinda læruplássum ein ávísan % part av lærlingalønini undir skúlagongd, sett í gildi frá 1. januar 1995.

Undir viðgerðini av málinum (løgtingsmál nr. 69/1994) hevði Mentannar- og skúlanevndin eitt uppskot til samtyktar, har heitt varð á landsstýrið um at leggja fyri tingið uppskot um at broyta løgtingslóg um lærlingaviðurskifti soleiðis, at endurgjaldið til meistara verður 100% frá 1. januar 1996, og at lærlingar ikki verður arbeiðstøkur í hesum tíðarskeiði.

Í álitinum hjá fíggjarnevndini til løgtingsfíggjarlógina 1998 (løgtingsmál nr. 71-97) stendur á blaðsíðu 4: "Játtanin verður hækkað við 1.150 tkr., orsakað av at løgtingslóg nr. 49 frá 2. mai 1995 verður broytt soleiðis, at landskassin kemur at rinda læruplássum alla lærlingalønina aftur, meðan lærlingur gongur í skúla. Endurgjaldið skal ikki verða hægri enn ásetta minstalønin hjá handverkslærlingunum."

Um fíggjarligu avleiðingarnar verður víst til omanfyri standandi.

Annars verður víst til serligu viðmerkingarnar niðanfyri.

Viðmerkingar til tær einstøk greinirnar

Ad. § 1. Sambært galdandi § 4, stk. 1, 3. pkt. endurrindar landskassin læruplássum 75% av lærlingalønini, meðan lærlingurin fær ta til læruna hoyrandi skúlagongd.

Skotið verður upp, at frammanfyri nevndu 75% verða broytt til 100%, sum tó ikki kann vera hægri enn minstalønin fyri handverkslærlingar.

Ad. § 2. Skotið verður upp, at lógin kemur í gildi 1. januar 1998 og ber hetta í sær, at tann til læruna hoyrandi skúlagongd, sum fer fram eftir 1. januar 1998, fær 100% endurgjald sambært § 4, stk. 1, 3. pkt.

1. viðgerð hósdagin 29. januar 1998. Uppskotið var beint í mentanarnevndina, sum fríggjadagin tann 13. februar 1998 legði fram soljóðandi

Álit

Málið er lagt fram av landsstýrinum 27. januar 1998 og eftir 1. viðgerð 29. januar 1998 beint í mentanarnevndina.

Nevndin hevur viðgjørt málið, og mælir ein samd nevnd løgtinginum til at samtykkja uppskotið.

2. viðgerð týsdagin 17. februar 1998. §§ 1 og 2 samtyktar 24-0-0. At uppskotið soleiðis samtykt kann fara til 3. viðgerð samtykt 26-0-0.

3. viðgerð fríggjadagin 20. februar1998. Uppskotið, sum samtykt við 2. viðgerð, endaliga samtykt 21-0-0.

Løgtingslóg nr. 25 frá 06.03.1998

F.L.j.nr. 2160-13/93

60 Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um val til Føroya løgting

Ár 1998, týsdagin 27. januar legdi Bjørn á Heygum, løgtingsmaður, vegna seg sjálvan og løgtingsmenninar Signar á Brúnni, Jógvan Adolf Johannessen, Kjartan I. Joensen, Jákup Olsen, Helenu Dam á Neystabø og Suna Jacobsen fram soljóðandi:

Uppskot
til
løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um val til Føroya Løgting

§ 1.

Í løgtingslóg nr. 49 frá 20. juli 1978 um val til Føroya Løgting, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 139 frá 20.12.1996, verður § 15. stk 2, 1. pkt. orðað soleiðis:

"Verður val, antin tí at løgtingið ella løgmaður hava skrivað út nyval, sendir løgmaður alt fyri eitt út kunngerð um hetta og ásetir valdagin við í minsta lagi 6 viku freist og í mesta lagi 8 viku freist, eins og løgmaður samstundis sigur valnevndunum frá hesum."

§ 2.

Løgtingslógin fær gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

Stk. 2. Allur hin danski teksturin í lógini verður strikaður.

Viðmerkingar

Í sambandi við viðgerðina av løgtingsmáli nr. 18/1997 Broyting í løgtingslóg um stýrisskipan Føroya er Rættarnevndin komin eftir, at § 15 stk. 2, 1. pkt. í løgtingsvallógini ikki er orðað samsvarandi orðalagnum í stýrisskipanarlógini § 6, stk. 2, og at bert ein minstafreist er fyri, nær valdagurin skal verða ásettur, men eingin evstafreist fyri, nær hetta skal verða.

Við lógaruppskotinum verður greinin útgreinað samsvarandi § 6, stk. 2 í stýrisskipanarlógini, og eitt evstafreist uppá 8 vikur verður sett fyri, nær løgtingsval skal haldast, eftir at løgtingið ella løgmaður hevur gjørt av, at nyval skal verða.

1. viðgerð hósdagin 29. januar 1998. Uppskotið varð beint í rættarnevndina, sum fríggjadagin tann 13. februar 1998 legði fram soljóðandi

Álit

Málið er lagt fram av Bjørn á Heygum, Signar á Brúnni, Jógvan Adolf Johannessen, Kjartan I. Joensen, Jákup Olsen, Helenu Dann á Neystabø og Suna Jacobsen 24. januar 1998 og eftir 1. viðgerð 29. januar 1998 beint í rættarnevndina.

Nevndin hevur viðgjørt málið, og mælir eitt samt nevnd løgtinginum til at samtykkja uppskotið.

2. viðgerð týsdagin 17. februar 1998. §§ 1 og 2 samtyktar 17-0-0. At uppskotið soleiðis samtykt kann fara til 3. viðgerð samtykt 18-0-0.

3. viðgerð fríggjadagin 20. februar1998. Uppskotið sum samtykt við 2. viðgerð endaliga samtykt 21-0-0.

Løgtingslóg nr. 24 frá 06.03.1998

61 Uppskot til løgtingslóg um arbeiðsrætt

Ár 1998, týsdagin 27. januar, legði Bjørn á Heygum, løgtingsmaður, vegna seg sjálvan og Óla Breckmann, løgtingsmann, fram soljóðandi:

UPPSKOT
til
løgtingslóg um Arbeiðsrætt Føroya

§ 1. Settur verður á stovn Arbeiðsrættur Føroya.

§ 2. Arbeiðsrætturin hevur sæti í Tórshavn. Í serligum førum kann arbeiðsrætturin verða settur uttanfyri Tórshavn

§ 3. Arbeiðsrættur Føroya hevur 13 limir:

1) Rættarformaðurin, sum er sorinskrivarin í Føroyum, ella ein løgfrøðingur, sum hann tilnevnir.
2) 6 meddómarar fyri løntakaraáhugamálum, ið verða valdir soleiðis:

a) Føroya Arbeiðarafelag velur 2 meddómarar.
b) Ein valbólkur av Havnar Arbeiðsmannafelag, Havnar Arbeiðskvinnufelag, Klaksvíkar Arbeiðsmannafelag, Klaksvíkar Arbeiðskvinnufelag og Arbeiðskvinnufelagnum Fjallbrúður velur 1 meddómara
c) Ein valbólkur av Føroya Fiskimannafelag, Skipara- og Navigatørfelaganum og Maskinmeistarafelagnum velur 1 meddómara
d) Ein valbólkur av Føroya Handverkarafelag, Sjúkrasystrafelag Føroya og Føroya Sjúkrahjálparafelag velur 1 meddómara.
e) Ein valbólkur av Starvsmannafelagnum, Føroya Postfelag og S & K-felagnum velur 1 meddómara.

3) 6 meddómarar fyri arbeiðsgevaraáhugamál, ið verða valdir soleiðis:

a) Føroya Arbeiðsgevarafelag velur 2 meddómarar.
b) Føroya Reiðarafelag velur 1 meddómara.
c) Føroya Handverksmeistarafelag velur 1 meddómara.
d) Føroya Keypmannafelag velur 1 meddómara.
e) Ein valbólkur av Føroya Landsstýri, Føroya Kommunufelag og kommunum, sum standa uttanfyri kommunufelagið, velur 1 meddómara.

Stk. 2. Samstundis sum meddómarar verða valdir, velur sorinskrivarin tveir løgfrøðingar sum vararættarformenn, og hvørt felag ella hvør valbólkur tveir varameddómarar fyri hvønn meddómara.

Stk. 3. Tilnevndur rættarformaður og vararættarformenn verða valdir fyri tey álmanakkaár í senn. Um ein teirra doyr ella flytur av landinum, velur sorinskrivarin annan løgfrøðing í hansara stað fyri tað frestandi valskeiðið.

Stk. 4. Meddómarar og varameddómarar verða valdir fyri trý ár í senn, og kunnu teir í hesum tíðarskeiði ikki setast frá uttan sbr. dómi. Teir eru í virki sínum óheftir av boðum frá feløgum, sum hava valt teir.

Stk. 5. Tað er borgarlig skylda at taka við vali sum meddómari og varameddómari.

Stk. 6. Meddómararnir og varameddómararnir skulu

vera borgarar í landinum, hava heimstað í Føroyum, vera myndugir og hava ræði á búgvi sínum.

§ 4. Í hvørjum máli dømir ein rættarformaður ella vararættarformaður og fyra meddómarar ella varameddómarar, tveir valdir eftir § 3, stk. 1, nr. 2, og tveir valdir eftir § 3, stk. 1, nr. 3.

Stk. 2. Um ein partur ynskir tað, og rættarformaðurin og vararættarformenninir taka undir við tí, verður mál av stórum prinsipiellum týdningi ella við óvanliga stórum avleiðingum dømt av rættarformanninum og báðum vararættarformonnunum og seks meddómarum ella varameddómarum, tríggir valdir eftir § 3, stk. 1, nr. 2, og tríggir valdir eftir § 3, stk. 1, nr. 3.

Stk. 3. Tá undantikin eru mál, sum dømd verða eftir stk. 2, gera rættarformaðurin og vararættarformenninir í felag av, hvør teirra skal døma í hvørjum einstøkum máli.

Stk. 4. Fyri hvørt mál sær ger rættarformaðurin av, hvørjir meddómarar ella varameddómarar skuldu døma, og verður tá at miða ímóti, at felag teirra ikki hevur beinleiðis áhuga í viðkomandi máli.

§ 5. Sorinskrivarin tilnevnir skrivara hjá arbeiðsrættinum, og kann hetta vera ein vararættarformaður.

§ 6. Hvørja ferð meddómarar og varameddómarar skulu veljast, gevur landsstýrið áðrenn 1. september boð til tey feløg, sum umrødd eru í § 3, stk. 1, nr. 2 og 3, um at velja meddómarar og varameddómarar og boða landsstýrinum og sorinskrivaranum frá innan 1. november.

Stk. 2. Um valbólkar, sum umrøddir eru í § 3, stk. 1, nr. 2 litra b), c), d) og e), og í § 3, stk. 1, nr. 3, litra e) ikki kunnu semjast um at velja meddómarar og varameddómarar, ger hvørt felag/stovnur sær tilmæli til landsstýrið áðrenn 1. november, og velur landsstýrið tá meddómarar og varameddómarar millum teirra, sum tilmældir eru, og gevur sorinskrivaranum boð um valið.

Stk. 3. Um feløg samboert § 3, stk. 1, nr. 2, litra a), og § 3, stk. 1, nr. 3, litra a), b), c) og d), ikki velja meddómarar og varameddómarar innan 1. november, ella feløg og stovnar, sum eru í valbólki eftir § 3, stk. 1, nr. 2, litra b), c), d) og e), ella § 3, stk. 1, nr. 3, litra e), ikki velja ella koma við tilmæli eftir stk. 2 innan 1. november, velur landsstýrið innan 1. desember viðkomandi meddómara og varameddómara og boðar sorinskrivaranum frá. Miðað eigur at verða fmóti, at arbeiðsgevara- og løntakarasíðan eru javnt umboðað.

§ 7. Tá vararættarformenn, meddómarar og varameddómarar eru valdir, heldur rættarformaðurin í desember mánaði kunnandi fund fyri øllum vararættarformonnum, meddómarunum og varameddómarunum.

§ 8. Føroya Landsstýri ásetir reglur um samsyning fyri rættarformannin, vararættarformenninar, meddómararnar, varameddómararnar og skrivaran, umframt reglur um skrivstovuhald.

§ 9. Útreiðslur til skrivstovuhald, samsyningar v.m. verða játtaðar á løgtingsins fíggjarlóg.

§ 10. Hesi mál kunnu verða løgd fyri arbeiðsrættin:

1) Brot á sáttmálar um løn og arbeiðsviðurskifti millum løntakarafeløg øðrumegin og arbeiðsgevarafeløg ella einstakan arbeiðsgevara hinumegin.
2) Um fráboðað felags stríðsstig eru lóglig.
3) Um felags sáttmáli fyriliggur.
4) Um loyvt er at nyta felags stríðsstig til stuðul fyri kravi um yrkisøki teirra.
6) Ósemjur um tulking av sáttmála um arbeiðsviðurskifti millum løntakarafeløg øðrumegin og arbeiðsgevarafeløg ella einstakan arbeiðsgevara hinumegin.

Stk. 2. Arbeiðsstaðgur skal beinanvegin verða fráboðaður feløgunum, og felagsfundur við feløgini, har samráðst verður um arbeiðsstaðgin, skal vera hildin í seinasta lagi dagin eftir, at arbeiðsstaðgurin er settur í verk, uttan so at arbeiðsstaðgurin er hildin uppat, áðrenn felagsfundurin verður hildin.

Stk. 3. Mál samboert stk. 1, nr. 1-2 kunnu bert verða skotin inn fyri arbeiðsrættin, um brotið er gjørt, ella stríðsstigið er fráboðað ella sett í verk av einum arbeiðsgevarafelag ella einum ella fleiri limum í einum slíkum, av einum einstøkum virki (einstaklingur, firma, partafelag ella almennur stovnur), ella av einum løntakarafelag, ella av limum í einum slíkum felag saman.

Stk. 4. Umframt tey í stk. 1 nevndu mál kunnu ósemjur millum arbeiðsgevarar og løntakarar verða lagdar fyri arbeiðsrættin, tá hann játtar hesum, og avtala millum arbeiðsgevara- og løntakarafelag ella millum einstakt virki og løntakarafelag er gjørd um hetta.

Stk. 5. Tulkingar av sáttmálum sum nevnt í stk. 1, nr. 6 skulu bara avgerast av arbeiðsrættinum, um so er, at tað ikki er ásett í sáttmála, at gerðarrættur samb. lov um voldgift er avtalaður

§ 11. Verður mál lagt fyri arbeiðsrættin, har spurningurin snýr seg um at døma, hvørt ein byrjaður arbeiðssteðgur er brot á sáttmála og at áleggja eina ábyrgdarbót, kann arbeiðsrætturin, um so er, at seinni spurningurin krevur gjølfari kanning, taka fyribils avgerð í fyrra spurninginum.

§ 12. Dómar í arbeiðsrættinum eru endaligir, og kunnu ikki verða skotnir inn fyri annan rætt ella fyrisitingarligan stovn.
Stk. 2. Sak kann ikki verða løgd fyri vanliga dómstólin um mál, ið sambært § 10 hoyra undir dómsøkið hjá arbeiðsrættinum.
Stk. 3. Um partur heldur, at Arbeiðsrætturin hevur dømt í máli, sum ikki kemur undir dómsøki hansara eftir § 10, kann viðkomandi partur skjóta henda spurningin inn fyri Eystara Landsrætt innan 4 vikur aftaná, at dómur er feldur.
Stk. 4. Um rætturin vísir mál frá sær av teirri orsøk, at málið ikki kemur undir dómsøki hansara eftir § 10, kann avgerðin verða kærd til landsrættin á sama hátt sum í stk. 3.

§ 13. Í málum, sum nevnd eru í § 10, stk. 1, kann arbeiðsrætturin døma tann ella tey, ið hava verið við í sáttmálabroti, eina ábyrgdarbót, sum skal ognast stevnanda. Er sáttmálabrotið um ikki at hava goldið eina skylduga peningaupphædd, kann dómurin í staðin fyri ábyrgdarbót vera at rinda hesa peningaupphædd. Um annað ikki er ásett framumanundan, kann sjálvum felagnum bara verða álagt rættarlig ábyrgd, um tað hevur verið virkið í málinum.
Stk. 2. Ábyrgdarbótin verður ásett við fyriliti í øllum viðurskiftum í málinum og við húskandi fyriliti fyri, í hvønn mun lógarbrotið hevur verið fyrigeviligt frá lógbrótarans síðu. Tá mett verður um arbeiðssteðg, sum er í stríð við sáttmálan, skal fyrilit takast fyri, um tað frá mótpartsins síðu fyriliggja viðurskifti av slíkum slag, at arbeiðssteðgurin verður hildin at vera rímiligur atburður. Ábyrgdarbótin kann annars fella heilt burtur, um hinnandi umstøður eru, og skal fella burtur, um arburður í stríð við sáttmálan frá mótpartsins síðu verður mettur at geva rímiliga orsøk til arbeiðssteðgin. Ábyrgdarbótin kann fella burtur, um tað verður prógvað, at arbeiðssteðgurin er elvdur av trivnaðar orsøkum, sum mótparturin hevur ábyrgdina av. Ábrygdarbót kann ikki verða áløgd teimum luttakarum í einum arbeiðssteðgi, sum hava tikið upp aftur arbeiðið, áðrenn semingsfundir hevur verið, ella hava fylgt eintum tilmæli frá hesum fundi um beinanvegin at fara aftur til arbeiðis, uttan tað verður prógvað, at eingin rímilig orsøk er til arbeiðssteðgin, ella arbeiðssteðgurin verður hildin at vera liður í eini skipaðari atgerð.

§ 14. Tað er viðkomandi arbeiðsgevara- ella leintakarafelag, sum leggur sak, og sum sak verður løgd ímóti, sama um brotið er framt, ella felags stríðsstig er fráboðað ella sett í verk av ella ímóti einstøkum limum í felagnum. Er felag limur í einum størri felag, so er tað hetta felag, sum er sakarmálspartur. Er arbeiðsgevaraparturin eitt virki smb. § 10, stk. 3, ið ikki er limur í nøkrum arbeiðsgevarafelag, so er tað virkið sjálvt, sum er sakarmálspartur.

§ 15. Sakarmál verður tikið upp á tann hátt, at hin stevnandi letur arbeiðsrættinum kærurit í tveimum eintøkum.
Stk. 2. Skrivarin sendir sum skjótast eitt eintak av kæruritinum til hin stevnda og krevur samstundis, at hann letur inn svarrit í tveimum eintøkum. Svarritið verður at lata inn til rættin innan eina av skrivaranum ásetta freist. Tá ið svarritið er latið inn, sendir skrivarin eitt eintak av hesum til hin stevnanda. Við hesum er skrivligi parturin av rættarmálsviðgerðini vanliga lokin.
Stk. 3. Til tess at royna seming í málinum ella at fáa til vega fleiri viðmerkingar frá pørtunum, kunnu partarnir boðsendast til fyrireikandi rættarfund, har rættarformaðurin ella ein av varaformonnunum er einsamallur í sæti.

§ 16. Arbeiðsrætturin kann um neyðugt lata stevning kunngera fyri stevnda eftir reglunum í kap. 17 í rættargangslógini.
Stk. 2. Møtir stevndi ikki, hóast fráboðaður sambært stk. 1, galda reglurnar í §§ 354, 360 og 362 í rættargangslógini. Rættargangsformaðurin kann einsamallur fella fráverudóm.
Stk. 3. Tann, sum stevndur er fyri arbeiðsrættin, hevur skyldu at møta.

§ 17. Tað eru ongar avmarkingar galdandi fyri partarnar, hvat ið viðvíkir at lata seg umboða av fulltrúa undir málsviðgerðini í arbeiðsrættinum. Rætturin avger, í hvønn mun ein partur kann luttaka í rættarviðgerðini við fleiri fulltrúum, og avger rætturin eisini, hvør kann fáa atgongd til rættartundirnar innfrant partarnir sjálvir og teirra sakarmálsfulltrúar.

§ 18. Rættarformaðurin avger við úrskurði tær rættur, sum í samband við vitnisførslu og synismeting taka seg upp í sambandi við málsviðgerðina.

§ 19. Fyri viðgerðarháttin annars galda tær fyri borgarligar sakir galdandi grundreglur í rættargangslógini 2. bók og kap. 28, 29 og 30 við neyðugum tillagingum.
Stk. 2. Rættarbók verður at skriva eftir reglunum í rættargangslógini kap. 3.

§ 20. Dómar, feldir av arbeiðsrættinum, kunnu innast eftir reglunum í rættargangslógini um tvingsilsfulnað av dómum. Semjur, gjørdar í arbeiðsrættin um, kunnu innast eftir reglunum í rættargangslógini um fulnað av semjum, sum gjørdar eru innanrættа.

§ 21. Henda lóg kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd. Samstundis fer úr gildi "Lov nr. 536 af 4. oktober 1919 om Den Faste Voldgiftsret" við seinni broytingum.

Almennar viðmerkingar

Á sumri í 1989 samtykti tásitandi landsstýri at seta eina nevnd, hvørs setningur skuldi vera at fyrireika uppskot til løgtingslóg um arbeiðsrætt. 18. januar 1990 legði nevndin fram álit um arbeiðsrætt.

Í álitinum var millum annað eisini eitt uppskot til løgtingslóg um arbeiðsrætt. Uppskotið varð tó ongantíð borið niðan í løgtingið. Hjálagda uppskot byggir í stóran mun á álitið frá 1990.

Endamálið við lógini um arbeiðsrættin er at skapa trygd fyri, at møgulig ósemja á arbeiðsmarknaðinum, sum hildin verður at vera í stríð við galdandi sáttmálar ella avtalur, kann roynast við ein skjótan rætt og har lága ríminliga og skjóta viðgerð. Um bíðast skal eftir viðgerð við vanliga dómstólin, tekur tað langa tíð, ofta ár, áðrenn avgerð fellur í málinum. Sambært lógaruppskotinum kunnu hesi mál verða løgd fyri arbeiðsrættin:

1. Brot á sáttmálar um løn og arbeiðsviðurskifti millum løntakarafeløg øðrumegin og arbeiðsgevarafeløg ella einstakan arbeiðsgevara hinumegin
2. Um fráboðað felags stríðsstig eru lóglig.
3. Um felags sáttmáli fyriliggur.
4. Um loyvt er at nyta felags stríðstig til stoðul fyri krav um sáttmálaøki, har felags sáttmáli ikki er gjørdur.
5. Ósemja millum løntakarafeløg ella millum arbeiðsgevarafeløg um yrkisøki teirra.
6. Ósemja um tulking av sáttmálanum.

Sambært lógaruppskotinum verða bæði løntakara- og arbeiðsgevarafeløgini javnt umboðað í arbeiðsrættinum.

Skipanin við gerðarrættum í teimum ymisku lønarsáttmálunum taka sær einans av tulkingarspurningum. Mett verður tí, at neyðugt er við einum arbeiðsrætti til tess at avgreiða mál, har spurningurin snýr seg um brot á sáttmálan. Í fakrættarligum viðurskiftum finnast tvey sløg av ósemjum, rættarósemjur og áhugaósemjur.

Rættarósemjurnar snúgva seg um møgulig brot á ein gildugan sáttmála, meðan áhugaósemjur stinga seg upp, tá ein skal samráðast um ein sáttmála. Tá talan er um áhugaósemjur (interessekonflikter), og sáttmálin er farin úr gildi, er loyvt at fara í verkfall/verkbann.

Stingur hinvegin ein rættarósemja seg upp, er friðarskylda millum partarnar, til ósemjan um tulkingina er greidd við ein gerðarrætt. Í sáttmálaskeiðum er sostatt ein friðarskylda hjá báðum pørtum. Flestu lond í heiminum hava ein arbeiðsrætt til at taka sær av sáttmálabrotum í arbeiðsmarknaðinum. Nú tá oljuvinnan stendur fyri durum, og útlendingar hava áhuga at stovna arbeiðspláss í Føroyum, er bráðneyðugt, at tey fakrættaðu viðurskiftini verða skipað.

Mett verður, at umsitingin av arbeiðsrættinum fer at kosta 1. mió. kr. árliga. Víst verður annars til serligu viðmerkingarnar niðanfyri og álitið um arbeiðsrætt frá 18. januar 1990.

+ skjøl.

Ad § 1. Í hesi grein verður umframt stovnanina ásett heiti á arbeiðsrættinum.

Ad § 2. Sambært hesi grein er meginreglan tann, at arbeiðsrætturin skal hava sæti í Tórshavn. Skotið verður upp, at møguleiki skal verða fyri at seta arbeiðsrættin uttanfyri høvuðsstaðin í serligum førum.

Ad § 3. Í hesi grein er ásett, at formannsskapurin er myndaður av trimum løgfrøðingum, og at meddómararnir verða valdir av pørtunum á arbeiðsmarknaðinum soleiðis, at ávíkavist arbeiðsgevarasíðan og løntakarasíðan velja hvør sínar 6 meddómarar. Harumframt verða valdir varameddómarar í sama lutfalli. Viðmerkjast skal, at tey løntakarafeløg, sum sett eru at velja meddómarar og varameddómarar, umboða meginpartin av løntakarunum, og at tað millum annað av umsitingarligum orsøkum ikki ber til at lata øll løntakarafeløg luttaka í hesum vali.

Ad § 4. Eftir hesi grein luttaka vanliga 5 meddómarar í rættarmálsviðgerðini, 2 valdir av arbeiðsgevarasíðuni, og 2 valdir av løntakarasíðuni, umframt rættarformaðurin. Vegna tess, at dómar í arbeiðsrættinum ikki kunnu skjótast inn fyri hægri rætt, verður mælt til, at nýggju dómarar luttaka í sakarmálsviðgerðini, tá talan er um mál av stórum prinsipiellum týdningi ella hava óvanliga stórar avleiðingar. 3 valdir av arbeiðsgevarasíðuni, og 3 av løntakarasíðuni, umframt rættarformaðurin og báðir vararættarformenninir.

Fyri at fáa eina objektiva avgerð, verður mælt til, at miðað verður ímóti, at tey feløg, sum vald hava meddómarar, ikki hava beinleiðis áhuga í málinum, sum viðgjørt verður.

Ad § 5. Skotið verður upp, at Sorinskrivarin tilnevnir skrivaran hjá arbeiðsrættinum, og at hetta kann vera ein vararættarformaður. Sambært § 3, stk. 2 skulu vararættarformenninir vera løgfrøðingar.

Ad § 6. Í hesi grein verður nærri tilskilað, nær valið av meddómarum og varameddómarum skal fara fram. Um so er, at meddómarar og varameddómarar ikki verða valdir innan eina ávísa freist, verða hesir valdir av landsstýrismanninum í arbeiðsmarknaðarmálum. Ásett er, at miðað eigur at verða ímóti, at arbeiðsgevara- og løntakarasíðan eru javnt umboðað.

Ad § 7. Skotið verður upp, at rættarformaðurin kallar allar limirnar og varalimirnar í arbeiðsrættinum til kunnandi fund. Hesin kunnandi fundur kann snúgva seg um ymisk praktisk viðurskifti hjá arbeiðsrættinum so sum mannagongdir við meira.

Ad § 9. Skotið verður upp, at tað almenna ber útreiðslurnar í sambandi við virki arbeiðsrættsins við árligari játtan á løgtingsins fíggjarlóg.

Ad § 10. Í hesi grein verður skotið upp, hvørji mál kunnu leggjast fyri arbeiðsrættin: Brot á sáttmála um løn og arbeiðsviðurskifti, um fráboðað felags stríðsstig eru lóglig, um felags sáttmáli fyriliggur, og um loyvt er at nýta felags stríðsstig til stuðul fyri krav um sáttmála á økjum, har felags sáttmáli ikki er gjørdur.

Vanliga verða sáttmálar á arbeiðsmarknaðinum gjørdir fyri eitt 2 ára tíðarskeið, og so leingi sáttmáli er í gildi, hava partarnir friðarskyldu. Tað vil siga at partarnir hava rætt og skyldu til at lata arbeiði greiða úr hondum undir treytum, ásettar í sáttmálanum.

Frá arbeiðstakarans síðu kann sáttmálabrot koma fyri, sum t.d. arbeiðsstoðgur, sum verkfall, herundir fakligur fundur, noktan at átaka sær yvirarbeiði, seinkan av arbeiðinum við vilja, og skipað avfólkan av arbeiðsplássinum.

Frá arbeiðsgevarans síðu kann sáttmálabrot koma fyri sum t.d. at útgjalda ov lítið í mun til galdandi sáttmála.

Sum onnur sáttmálabrot kunnu nevnast brot á reglurnar um ávaringar og mannagongdir.

Vert er at leggja merki til, at tann friðarskyldan, sum er galdandi í sáttmálaríðarskeiðinum, fyrir við sær, at arbeiðssteðgur kann ikki nýtast sum vápn fyri at loysa eina ósemju um tulking av sáttmála. Um ósemja stingur seg upp um tulking, skal henda annaðhvørt avgerast av arbeiðsrættinum ella av einum gerðarrætti, um partarnir hava avtalað hetta. Um arbeiðsgevarin gjøgnumtvingar eina tulking, sum greitt er í stríð við sáttmálan, kann hann verða dømdur eftir stk. 1, nr. 1. Um løntakarin hinvegin er ósamdur við arbeiðsgevaran um tulking, uttan at arbeiðsgevarans tulking eyðsyniligt er í stríð við sáttmálan, og løntakarin roynir at gjøgnumtvinga sína tulking við at fara í verkfall, so er hetta eisini brot á á stk. 1, nr. 1.

Ad § 11. Fyri at fáa eina skjóta avgerð um ein byrjaður arbeiðssteðgur (byrjað verkbann ella verkfall) er í stríð við galdandi sáttmála, verður skotið upp, at avgerð um henda spurning verður tikin skjótast til ber, men at spurningurin um møguliga ábyrgdarbót, um hesin krevur gjøllari kanning, kann takast við eini seinni avgerð.

Ad § 12. Skotið verður upp, at dómar í arbeiðsrættinum eru endaligir. Hetta merkir, at dómar, sum arbeiðsrætturin fellur, ikki - eins og innan vanliga rættarskipanina - kunnu kærast fyri annan rætt ella fyrisitingarligan myndugleika. Skotið verður upp, at mál, sum hoyra til dómsøkið hjá arbeiðsrættinum, ikki kunna verða løgd fyri vanliga dómsstólin, um so er, at partur heldur, at dømt hevur verið í málið, sum ikki kemur undir dómsøkið hjá arbeiðsrættinum, og kann viðkomandi partur skjóta henda spurning inn fyri Eystara Landsrætt, eftir at dómur er fetdur í arbeiðsrættinum. Tað sama er galdandi, um so er, at arbeiðsrætturin vísir mál frá sær við teirri grundgeving, at arbeiðsrætturin metir málið ikki at koma undir dómsøki sítt.

Ad § 13. Í hesi grein verður skotið upp, at arbeiðsrætturin kann døma tann, ið framt hevur sáttmálabrot, eina ábyrgdarbót, sum skal ognast stevnanda. Í teimum ofta fløktu viðurskiftunum, har skuldin hjá tí eina partinum ofta kann vera frumkomin við einari óheptnari atgerð frá hinum partinum, og har markið millum tað lógliga og tað, sum er í stríð við lógina, ofta er rættiliga ógreitt, tykist tað vera neyðugt at leggja dent á, at tann parturin, sum hevur gjørt seg inn á sáttmálan, og sum so eftir vanligum avtalureglum er endurgjaldsskyldugur, onkursvegna ikki treytaleyst skal veita endurgjald fyri allan skaðan, sjálvt um skuld hansara hevur verið støri ella minni, líkamikið um talan er um linandi umstøður ella ikki, og líkamikið hvat høvið mótparturin kann hava veitt ella givið. Møguleiki er hjá rættinum at gera av, í hvønn mun ein partur kann luttaka í viðgerðini hjá fleiri fulltrúum. Somuleiðis kann rætturin avgera, hvør kann fáa atgongd til rættarfundirnar.

Ad § 14. Í hesi grein verður nærri ásett, hvør kann leggja sak við arbeiðsrættin. Talan kann vera um ávíkavist arbeiðsgevara ella løntakarafelag, sum leggur sak. Skotið verður upp, at tá talan er um felag sum er limur í einum størri felag, so er tað hetta felag, sum er sakarmálspartur. Er talan um eitt virki, sum ikki er limur í einum arbeiðsgevarafelag, so er tað virkið sjálvt, sum er sakarmálspartur.

Ad § 15. Í hesi grein verður nærri ásett, hvussu sakarmál við arbeiðsrættin verður tikið upp. Skotið verður upp, at fyrsti parturin av rættarmálsviðgerðini er skrivligur. Sambært greinini er eisini møguleiki at royna seming í málinum ella til at fáa til vega fleiri viðmerkingar frá pørtunum, og kunnu hesir innkallast til ein fyrireikandi rættarfund.

Ad § 16. Sambært hesi áseting er møguleiki at lata kunngera stevning fyri saksøkta eftir reglunum í kap. 17 í rættargangslógini. Hugsað verður um tann partin av kap. 17, sum snýr seg um borgarlig mál. Skotið verður upp, at tann, sum er stevndur fyri arbeiðsrættin, hevur møtiskyldu. Um so er at stevndi ikki møtir, galda reglurnar í § 354, § 360 og § 362 í rættargangslógini. Hetta kann millum annað føra við sær, at fráverudómur kann fellast til fyrimuns fyri saksøkjaran.

Ad § 17. Í hesi grein verður skotið upp, at partarnir kunnu lata seg umboða av fulltrúa undir málsviðgerðini

í arbeiðsrættinum. Møguleiki er hjá rættinum at avgera, í hvønn mun ein partur kann luttaka í viðgerðini við fleiri fulltrúum. Somuleiðis kann rætturin avgera, hvør kann fáa atgongd til rættarfundirnar.

Ad § 18. Í sambandi við trætur um vitnisførðslu og synsmetingar í sambandi við málsviðgerðina verður skotið upp, at rættarformaðurin einsamallur við úrskurði tekur avgerð um hesar trætur.

Ad § 19. Skotið verður upp, at viðgerðin av málum í arbeiðsrættinum skal fara fram á sama hátt við neyðugum tillagingum, sum tær ið eru galdandi fyri borgarlig mál við vanliga dómstólin. Somuleiðis verður skotið upp, at ført verður rættarbók eftir reglunum í kap. 3 í rættargangslógini.

Ad § 20. Skotið verður upp, at dómar feldir av arbeiðsrættinum kunnu innast eftir reglunum í rættargangslógini um tvingsilsfulnað av dómum, vísast kann í hesum sambandi til § 478, stk. 1 1) í rættargangslógini. Tað sama er galdandi fyri fulnað av semjum, sum eru gjørdar í arbeiðsrættinum, og kann í hesum sambandið vísast til § 478, stk. 1 2) í rættargangslógini.

Ad § 21. Skotið verður upp, at lógin kemur í gildið dagin eftir, at hon er kunngjørd. Somuleiðis verður skotið upp, at lógin um "Den Faste Voldgiftsret", sum framvegis formelt er í gildi í Føroyum, verður tikin av.

Skjal
Álit um arbeiðsrætt

INNGANGUR

Í samgonguskjalinum hjá landsstýrinum, sum skipað varð millum Fólkaflokkin, Sambandsflokkin og Tjóðveldisflokkin í 1989, varð ásett, at arbeiðsrættur skuldi setast á stovn.

Á fundi í landsstýrinum 29. juni 1989 samtykti landsstýrið at seta eina nevnd, hvørs setningur skuldi vera at fyrireika uppskot til løgtingslóg um arbeiðsrætt. Landsstýrið valdi á sama fundi triggjar løgfrøðingar í nevndina: Tórnóður Djurhuus, advokat, Páll Nielsen, advokat, og Jákup Nielsen, fulltrúa í landsstýrinum. Nevndin skipaði seg á sínum fyrsta fundi 14. august 1989 við seinast nevnda sum formanni og skrivara. Nevndin hevur havt 11 fundir í Havn, umframt at hava fundast í 2 dagar vesturi í Vágum at gera uppskotið liðugt.

Nevndin metir við hesum arbeiði sítt at vera at enda komið, og leggur meirlutin fram hjálagda uppskot til løgtingslóg um arbeiðsrætt við viðmerkingum.

Mælt verður til, at landsstýrið sendir feløgunum á arbeiðsmarknaðinum álitið til ummælis.

Ein minniluti (Páll Nielsen) ger vart við, at hann ikki tekur undir við lógaruppskotinum og ger tessvegna sítt egna tilmæli.

Tórshavn, tann 18. januar 1990

Jákup Nielsen (sign.)

Tórnóður Djurhuus (sign.) Páll Nielsen (sign.)

Vanligar viðmerkingar

Tá ið heimastýrislógin kom í gildi fyri Føroyar, vórðu "Arbeiðsviðurskifti" gjørd til sermál smb. lista A, pkt. 5 til lógina.

Av hesum fylgir, at í Føroyum verður lógin frá 1919 um Den faste Voldgiftsret galdandi við teimum broyt ingum, sum hesi lóg hevur verið fyri, fram til heimastýrislógin tekur við.

Hetta var so støðan í Føroyum til 1973, tá ið lóg um Arbejdsretten nr. 317 frá 13. juni 1973 verður sett í gildi fyri Danmark, ein lóg, sum samstundis setir úr gildi 1919-lógina um Den faste Voldgiftsret og við tí avtekur dómstólin í arbeiðsrættum við teirri samanseting, sum 1919-lógin ásetir.

1973-lógin um Arbejdsretten er ikki galdandi fyri Føroyar, og førir tað við sær, at hóast spurnarmekin kann setast við, um 1919-lógin eisini er sett úr gildi fyri Føroyar, so verða vit at staðfesta, at dómstólurin smb. 1919-lógini er ikki til longur, og er sostatt eingin arbeiðsdómstólur til at døma í føroyskum arbeiðsásemjum.

Ikki fyrireno við hægstarættardóminum í 1986 í "merkjamálinum", fáa vit greiði á hesum løgfrøðiliga heldur fløktu viðurskiftum. Hægstirættur kemur til ta niðurstøðu, at "Den med tilslutning af Færøernes Landsstyre gennemførte bestemmelse i § 25 i lov nr. 317 af 13. juni 1973 om Arbejdsretten medførte, at hverken denne lov eller den ved loven ophævede ældre lovgivning derefter var gældende for Færøerne".

Sitandi landsstýri skrivaði tann 11. august 1979 ríkismyndugleikunum bræv (skjal 1 til lógaruppskotið), har upplýst verður, at ætlanin er at seta ein arbeiðsrætt á stovn fyri Føroyar við "sama slag av uppgávum v.m. fyri Føroyar, sum tann arbeiðsrætturin hevur í hinum partinum av kongaríkinum, ið stovnsettur er við lóg nr. 317 frá 13. juni 1973", og verður samstundis tilskilað í brævinum, at landsstýrið ikki roknar við, at ríkismyndugleikarnir fara at gera atfinningar ímóti, at heimastýrið hesum sermáli viðvíkjandi fremur lóggávu av hesum slagi, haruppií við somu reglum, sum §§ 11 og 12 í lóg nr. 317 frá 13. juni 1973.

Ríkisumboðið svarar landsstýrinum í brævi frá 20. september 1989 (skjal 2 til lógaruppskotið), at "rigsmyndighederne intet har at indvende imod, at der ved lagtingslov etableres en arbejdsret med de opgaver, som er beskrevet i landsstyrets skrivelse af 11. august 1989".

Annars verður víst til hægstarættardómin í "merkjamálinum", sum er endurgivin í Ugeskrift for Retsvæsen fyri 1986, bls. 314, og blaðgreinir í sama fakriti av Peter Blume í U 1986 B, bls. 278-279, Frederik Harhoff í U 1987 B, bls. 348-352, og Torben Jensen í U 1988 B, bls. 31-35.

Meirlutin í nevndini, sum sett er av landsstýrinum við skrivi frá 5. juli 1989 og við tí setningi at "fyrireika uppskot til løgtingslóg um arbeiðsrætt", hevur við frammanfyri nevnda brævaskifti við ríkismyndugleikarnar í huga gjørt uppskot til løgtingslóg um Arbeiðsrætt Føroya, sum í bygnað í sínum leggur seg uppat tí danska arbeiðsrættinum, heldur eisini við tí í huga, at vit í mong ár hava havt somu rættarskipan sum Danmark á hesum øki, at vit hava eina samanfalfandi rættartraditión á økinum, og hvat serliga viðvíkir rættargangsreglunum, so er at kalla sama rættargangslógin í gildi í Føroyum sum í Danmark.

Uppskotið skilir seg tó avgerandi frá donsku lógini, hvat viðvíkir reglunum í § 12, stk. 3 og stk. 4, um appell og reglini í § 13 um endurgjaldsskyldu. Her hevur nevndin í § 13 í lógaruppskotinum valt at skjóta upp eina endurgjaldsskipan, ið er lík teirri skipan, sum galdandi er í hinum Norðanlondunum, heldur enn tí sektarskipan, sum danir hava.

Hetta er eisini støðan, hvat viðvíkir møguleikanum fyri at skjóta dómar inn fyri hægri rætt, um partur metir, at arbeiðsrætturin hevur dømt í máli, sum ikki kemur undir virkisøki hansara, ella rætturin hevur vist frá sær mál við teirri grundgeving, at hann metir, at tað ikki kemur undir virkisøki hansara.

Hvat annars samanselingini av dómstólinum viðvíkir, § 3 í lógaruppskotinum, so hevur nevndin gjøtla umhugsað henda spurningin, og er niðurstøðan hjá meirlutanum, at fyriliggjandi uppskot fer at geva eina samanseting av dómstólinum, sum tryggjar, at tann løgfrøðiliga og serfakliga vitanin er tryggjandi umboðað.

Víst verður annars til viðmerkingarnar til tær einstøku greinirnar.

Viðmerkingar eru gjørdar til §§ 3, 4, 9, 10, 11 og 13.

Endaliga er at siga, at nevndin sær til brúk í arbeiði sínum hevur útvegað sær galdandi lóggávu um arbeiðsrætt í Íslandi, Noregi og Svørtki, og sæst, at lóggávan á hesum øki er rættiliga ólík í teimum ymsu Norðanlondunum í bygnaði sínum.

Tilmæli frá minnilutanum (Páll Nielsen):
Minnilutin, Páll Nielsen, kann, við teimum grundgevingum, sum niðanfyri eru tilskilaðar, ikki taka undir við lógaruppskotinum og mælir undir verandi umstøðum frá, at arbeiðsrættur verður settur á stovn í Føroyum.

Fyrst er at viðmerkja, at ivasamt tykist vera, um løgtingið hevur heimild at lóggeva um slíkan serdómastól, sum her er talan um.

Eg skal tannars fyrst gera nakrar almennar viðmerkingar til spurningin um arbeiðsrætt, og havi at enda viðmerkingar til nakrar av greinunum í lógaruppskotinum frá meirlutanum í nevndini.

Sum kunnugt eru partar av arbeiðsmarknaðinum ímóti at seta á stovn arbeiðsrætt, og meti eg tað tí vera sera ivasamt, um rætt er at seta á stovn slíka skipan.

Ein fyritreyt fyri, at arbeiðsrættarin skal virka eftir ætlan, er, at partarnir á arbeiðsmarknaðinum taka undir við og hava álit á tí skipan, sum verður sett í verk.

Eg meti tað serliga undir hesum umstøðum vera náttúrligt, at partarnir á arbeiðsmarknaðinum høvdu fingið seti í nevndini, og har høvdu fingið beinleiðis ávirkan á tað álit, sum lutið verður landsstýrinum.

Hetta er vanlig mannagongd, og teir áhugabólkar, sum ein ætlað lóg kemur at viðvíkja, fáa høvi til beinleiðis at taka lut í tí fyrireikingararbeiði, sum gjørt verður, áðrenn lógaruppskotið verður lagt fram.

M.a. kann viðmerkjast, at í nevndini, sum sett var í Danmark í 1970 til at fyrireika broytingar í lógini um arbeiðsrættin, sótu umboð fyri havdi løntakarafeløgini og fyri arbeiðsgevarafeløgini.

Mælt verður í inngangintum til, at lógaruppskotið verður sent út til partarnar á arbeiðsmarknaðinum til ummælis, men gevur hetta ikki sama møguleika at fáa fram tey ymisku sjónarmiðini og tað orðaskifti millum tey, sum beinleiðis skulu nýta lógina, og sum er sera umráðandi fyri at fáa sett upp og orðað eitt lógaruppskot, ið kann koma at virka eftir ætlan.

Eg meti, at skábráið, sum nevndin hevur havt, er í so stutt, og førir hetta til, at nevndin ikki í tann mun, sum ynskiligt hevði verið, hevur havt stundir nærri at kanna út í æsir, hvussu ein møgulig lóggáva um fakrættarligu skipan okkara átti at verðið orðað við serligum atliti til tey serføroysku viðurskiftini á arbeiðsmarknaðinum.

Sum tað eisini er nevnt aðrastaðni í hesum áliti, so eru lógirnar í grannalondum okkara sera ymiskar, og vísir hetta eisini, at umráðandi er at tillaga eina møguliga lóggávu eftir viðurskiftunum í tí landi, har skipanin skal virka.

Eg loyvi mær at vísa á, at alstórur munur er á Føroyum og hinum grannalondum okkara, t.d. hvussu felagini eru skipað ávikavist á løntakarasíðuni og á arbeiðsgevarasíðuni.

Eisini er stórur munur á, hvussu sáttmálaviðurskiftini eru skipað.

Serliga orsakað av tí stuttu tíð, nevndin hevur havt at virka í, síggi eg meg ikki føran fyri at seta fram fullfiggjað uppskot til lóg um fakrættarligu skipan okkara, sum í nóg stóran mun hevur atlit til serligu viðurskifti okkara.

Eg skal tó gera nakrar viðmerkingar til sjálvt lógaruppskotið hjá meirilutanum í nevndini. Sí soleiðis undir serligum viðmerkingum til § 10 (virkisøki) og § 13 (endurgjald).

Uppskot
til
løgtingslóg um Arbeiðsrætt Føroya

§ 1. Settur verður á stovn Arbeiðsrættur Føroya.

§ 2. Arbeiðsrætturin hevur sæti í Tórshavn. Í serligum førum kann arbeiðsrætturin verða settur uttan fyri Tórshavn.

§ 3. Arbeiðsrættur Føroya hevur 13 limir:

1) Rættarformaðurin, sum er Sorinskrivarin í Føroyum, ella ein løgfrøðingur, sum hann tilnevnir.
2) 6 meddómarar fyri løntakaraáhugamálum, ið verða valdir soleiðis:
   a) Føroya Arbeiðarafelag velur 2 meddómarar.
   b) Ein valbólkur av Havnar Arbeiðsmannafelag, Havnar Arbeiðskvinnufelag, Klaksvíkar Arbeiðsmannafelag, Klaksvíkar Arbeiðskvinnufelag og Arbeiðskvinnufelagið Fjallbróður velur 1 meddómara.
   c) 1 valbólkur av Føroya Fiskimannafelag, Føroya Skipara- og Navigatørfelag og Maskinmeistarafelagnum velur 1 meddómara.
   d) 1 valbólkur av Føroya Handverkarafelag, Sjúkrasystrafelag Føroya og Føroya Sjúkrahjálparafelag velur 1 meddómara.
   e) 1 valbólkur av Starvsmannafelagnum, Føroya Postfelag og S&K-felagnum velur 1 meddómara.
3) 6 meddómarar fyri arbeiðsgevara áhugamál, ið verða valdir soleiðis:
   a) Føroya Arbeiðsgevarafelag velur 2 meddómarar.
   b) Føroya Reiðarafelag velur 1 meddómara.
   c) Føroya Handverksmeistarafelag velur 1 meddómara.
   d) Føroya Keypmannafelag velur 1 meddómara.
   e) Ein valbólkur av Føroya Landsstýri, Føroya Kommunufelag og Tórshavnar kommunu velur 1 meddómara.

Stk. 2. Samstundis sum meddómarar verða valdir, velur sorinskrivarin tveir løgfrøðingar sum vararættarformenn, og hvørt felag ella hvør valbólkur tveir varameddómarar.

Stk. 3. Tilnevndur rættarformaður og tilnevndir vararættarformenn verða valdir fyri tríggjar álmanakkaár í senn. Um ein teirra doyr ella flytur av landinum, velur sorinskrivarin annan løgfrøðing í hansara stað fyri tað frestandi valskeiðið.

Stk. 4. Meddómarar og varameddómarar verða valdir fyri trý ár í senn, og kunnu teir í hesum tíðarskeiði ikki avsetast. Teir eru í virki sínum óheftir av boðum frá felagnum, sum hava valt teir.

Stk. 5. Tað er borgarlig skylda at taka við vali sum meddómari og varameddómari.

Stk. 6. Meddómararnir og varameddómararnir skulu vera borgarar í landinum, hava heimstað í Føroyum, vera myndugir og hava ræði á búgvi sínum.

§ 4. Í hvørjum máli dømir ein rættarformaður ella vararættarformaður og fyra meddómarar ella varameddómarar, tveir valdir eftir § 3, stk. 1, nr. 2, og tveir valdir eftir § 3, stk. 1, nr. 3.

Stk. 2. Um ein partur ynskir tað, og rættarformaðurin og vararættarformennirnir taka undir við tí, verður mál av stórum prinsipiellum týdningi ella við óvanliga stórum avleiðingum dømt av rættarformanninum og báðum vararættarformonnunum og seks meddómarum ella varameddómarum, tríggir valdir eftir § 3, stk. 1, nr. 2, og tríggir valdir eftir § 3, stk. 1, nr. 3.

Stk. 3. Tá undantikin eru mál, sum dømd verða eftir stk. 2, gera rættarformaðurin og vararættarformennirnir í felag av, hvør teirra skal døma í hvørjum einstøkum máli.

Stk. 4. Fyri hvørt mál ger rættarformaðurin av, hvørjir meddómarar ella varameddómarar, sum skuldu døma, og verður tá at miðja ímóti, at felag teirra ikki hevur beinleiðis áhuga í viðkomandi máli.

§ 5. Sorinskrivarin tilnevnir skrivara hjá arbeiðsrættinum, og kann hetta vera ein vararættarformaður.

§ 6. Hvørja ferð, meddómarar og varameddómarar skulu veljast, gevur landsstýrið áðrenn 1. september boð til tey feløg, sum umrødd eru í § 3, stk. 1, nr. 2 og 3, um at velja meddómarar og varameddómarar, og at boða landsstýrinum og sorinskrivaranum frá innan 1. november.

Stk. 2. Um valbólkar, sum umrøddir eru í § 3, stk. 1, nr. 2 litra a), c), d) og e), og í § 3, stk. 1, nr. 3, litra c) ikki kunnu semjast um at velja meddómarar og varameddómarar, ger hvørt felag/stovnur sær tilmæli til landsstýrið áðrenn 1. november, og velur landsstýrið tá meddómarar og varameddómarar millum teirra, sum tilmældir eru, og gevur sorinskrivaranum boð um valið.

Stk. 3. Um feløg sambært § 3, stk. 1, nr. 2, litra a), og § 3, stk. 1, nr. 3, litra a), b), c) og d), ikki velja meddómarar og varameddómarar innan 1. november, ella feløg og stovnar, sum eru í valbólki eftir § 3, stk. 1, nr. 2, litra b), c), d) og e), ella § 3, stk. 1, nr.

2. litra e), ikki velja ella koma við tilmæli eftir stk. 2 innan 1. november, velur landsstýrið innan 1. december viðkomandi meddómara og varameddómara og boðar sorinskrivaranum frá. Miðað eigur at verða fmóti, at arbeiðsgevara- og løtakarasíðan eru javnt umboðað.

§ 7. Tá vararættarformenn, meddómarar og varameddómarar eru valdir, heldur rættarformaðurin í december mánaði kunnandi fund fyri øllum vararættarformonnum, meddómarunum og varameddómarunum.

§ 8. Føroya landsstýri ásetir reglur um samsyning fyri rættarformannin, vararættarformenninar, meddómararnar, varameddómararnar og skrivaran, umframt reglur um skrivstovuhald.

§ 9. Útreiðslur til skrivstovuhald, samsyningar v.m. verða játtaðar á løgtingsins fíggjarlóg.

§ 10. Hesi mál kunnu verða løgd fyri arbeiðsrættin:
1) Brot á sáttmálar um løn og arbeiðsviðurskifti millum løntakarafeløg øðrumegin og arbeiðsgevarafeløg ella einstakan arbeiðsgevara hinumegin.
2) Um fráboðað felags stríðsstig eru løglig.
3) um felagssáttmáli fyriliggur.
4) um loyvt er at nyta felags stríðsstig til stuðul fyri krav um sáttmála á økjum, har felags sáttmáli ikki er gjørdur.

Stk. 2. Arbeiðsstaðgur skal beinanvegin verða fráboðaður feløgunum, og felagsfundur við feløgini, har samráðst verður um arbeiðsstaðgin, skal verða hildin í seinasta lagi dagin eftir, at arbeiðsstaðgurin er settur í verk, uttan so at arbeiðsstaðgurin er hildin uppat, áðrenn felagsfundurin verður hildin.

Stk. 3. Mál sambært stk. 1, nr. 1-2, kunnu bert verða skotin inn fyri arbeiðsrættin, um brotið er gjørt ella stríðsstigið er fráboðað ella sett í verk av einum arbeiðsgevarafelag ella einum ella fleiri limum í einum slíkum, av einum einstøkum virki (einstaklingur, firma, partafelag ella almennur stovnur) ella av einum løntakarafelag ella av limum í einum slíkum felag saman.

Stk. 6. Síðst í mánaðinum, tá ein, ið hevur rætt til endurgjald, fyllir 67 ár, verður tann framhaldandi veitingin at gjalda einaferð með alla, sum svarar til 2 ferðir ta árligu veitingina eftir stk. 4. Er ein, ið hevur rætt til endurgjald, tá avgerðin verður tikin, fyltur 67 ár, verður endurgjaldið útgoldið sum viðmerkt í pkt. 1.

§ 38. Hevur ein vanlukkutilburður horið hinum skadda varandi og ikki smávegis skaða av læknafrøðiligum slag, eigur hann at fáa endurgjald fyri varandi mein. Endurgjald verður tó ikki latið, um meinstigið verður áseit til minni enn 5%.

Stk. 2. Vanlukkutryggingarnevndin ásetir meinstigið grundað á tað læknafrøðiliga slagið og støddina av skaðanum og við fyriliti til teir vansar í teirri persónligu tilveruni hjá skadda, sum skaðatilburðurin er atvoldin til.

Stk. 3. Endurgjald fyri varandi mein verður áseilt sum ein peningaupphædd, sum við einum meinstigi upp á 100% verður kr. 300.000. Upphæddin verður javnað sambært § 54, stk. 3. Við lægri avlamisstigum verður upphæddin lækkað lutfalsliga. Vanlukkutryggingarnevndin kann í serligum førum hækka meinendurgjaldið, tó ikki við meira enn 20%.

§ 39. Um so er, at rentan sambært § 37 verður áseit eftir avlamisstigunum 50% ella meiri, verður hon goldin frá tí degi, tá ið dagpeningurin heldur uppat. Í øllum øðrum førum verður hon goldin frá tí degi, Vanlukkutryggingarnevndin hevur avgjørt spurningin um avlamni.

§ 40. Rentunjótari hevur skyldu til at siga Vanlukkutryggingarnevndini frá hvørjari broyting í viðurskiftum hansara, sum kann ætlast at bera við sær, at rentan verður lækkað ella fellur burtur, eins og Vanlukkutryggingarnevndin skal geva tí gætur, um slík broyting verður.

Stk. 2. Vanlukkutryggingarnevndini er heimilað at senda ein ella fleiri serkønur til at hava eftirlit á staðnum við arbeiðsløsinum hjá rentunjótaranum ella at boða teimum til eftirlits. Um so er, at rentunjótarin tálmar kanning hjá Vanlukkutryggingarnevndini, kann Vanlukkutryggingarnevndin, tá ið tað heldur líkt vera tilt, at avgerðin verður tann, at rentan skal verða tikin av ella lækkað, bráðfeingis steðga gjalding av rentuni heilt ella fyri ein part. Útreiðslurnar av eftirlitt ber tryggingarfelagið.

Stk. 3. Hevur rentunjótari, tó at hann visti betur, sambæn stk. 1, av óráttum fingið rentu sambært hesi lóg, skal tann peningur, sum er lingin av óráttum, eftir avgerð hjá Vanlukkutryggingarnevndini verða afturgoldin av honum, møguliga av deyðsbúgvi hansara.

Stk. 4. Metir Vanlukkutryggingarnevndin, at tær um-

støður, sum vóru avgerandi, tá ið rentan varð ásett, eru munandi broyttar, verður rentan at hækka, lækka ella taka av, alt eftir broytingunum, sum hendar eru. Tílíkar broytingar av rentuni kunnu tó ikki verða gjørdar, tá ið 5 ár eru liðin frá tí, at rentan fyrstu ferð varð ásett, uttan so at Vanlukkutryggingarnevndin í tí einstaka førinum metir, at endaliga avlamisstigið her ikki til at áseta tá. Um so er, setir Vanlukkutryggingarnevndin, áðrenn tað nevnda tíðarskeiðið er liðið, eina freist til uppaltúrtøku av málinum til endaliga avgerð.

§ 41. Verður Vanlukkutryggingarnevndin, t.d. við fráboðan frá øðrum myndugleikum, teimum avvarðandi hjá rentunjótaranum ella øðrum einstaklingum gjørd varug við, at rentunjótari ikki eigur at hava ræði á teirri rentu, honum er játtað, tekur hon eftir áttandi kannan av viðurskiftunum avgerð um, á hvønn hátt hann skal njóta gott av rentuni, við tað at Vanlukkutryggingarnevndin um neyðugt skipar so fyri, at rentunjóturin missir fíggjarræðið.
Stk. 2. Reglurnar í stk. 1 verða á samsvarandi hátt nýttar um dagpening eftir hesi lóg.

§ 42. Um rentan er roknað eftir avlamisstigi 50% ella meiri, kann tann árliga rentan ella partur av henni bert í heilt serligum føri, og tá ið tann, sum rætt hevur til rentuna, samtykkir í tí, verða broytt til peningaupphædd. Peningaupphæddin kann í serligum førum verða ognarbundin.
Stk. 2. Um rentan er roknað eftir avlamisstigi, ið er lægri enn 50%, skal rentan vanliga, og tað uttan at samtykki krevst frá honum, sum rætt eigur til hennara, verða broytt til peningaupphædd.
Stk. 3. Gjølligari reglur fyri broyting av rentu til peningaupphædd setir landsstýrismaðurin í almanna- og heilsumálum eftir tilráðing frá Vanlukkutryggingarnevndini. Tá ið hesar reglur verða settar, skal verða tikið at ákvi hins skadda, at tí, hvussu langt síðan vanlukkan bar sá, og avlamisstiginum.
Stk. 4. Umroknin av rentuni til peningsupphædd verður gjørd eftir rentustøddini, tá ið umroknað verður.

§ 43. Verður samtykt, at arbeiðsførið hjá avlamna er munandi verri enn ætlað um tað mundið, tá ið broytingin av rentu til peningaupphædd fór fram, er Vanlukkutryggingarnevndini heimilt, smb. tó § 40, stk. 4 í fórum, tá ið umstøðurnar annars mæla til tess, at veita honum árliga rentu, sum er munurin millum fa rentu, sum broytingin til peningaupphædd er gjørd eftir, og tá rentu, sum svarar til tað hægra avlamisstigið, sum seinni varð funnið. Tann rentan, sum soleiðis er játtað, kann undir teimum treytum, sum nevndar eru í § 42, verða broytt til peningaupphædd, og verður tá farið eftir øllum avlamunum.

§ 44. Tann peningaupphædd, sum veitt verður persónum, ið ikki hava sjálvræði, kemur teimum til gagns á tann hátt, sum Vanlukkutryggingarnevndin ger av. Hvat viðvíkur persónum, ið hava sjálvræði, verður víst til § 42, stk. 1 og 2.
Stk. 2. Tað liggur á kommunustýrinum og løgreglumi at veita Vanlukkutryggingarnevndini hjálp, tá ið endurgjaldspeningur skal verða goldin og settur.

§ 45. Stendst deyði av vanlukkutilburðinum hevur eftirsitandi hjúnafelagi rætt til eina skiftisveiting einaferð með alla uppá kr. 100.000,-, um hjúnabandið var komið í lag áðrenn vanlukkutilburðin, og hjúnafelagarnir framvegis livdu saman, tá skaddi deyði. Veitingin verður javnað eftir § 54, stk. 3.
Stk. 2. Er hjúnabandið komið í lag aftaná vanlukkutilburðin, hevur tann eftirsitandi hjúnafelagin rætt til somu skiftisveiting, um hjúnabandið áðrenn deyða skalda hevði vart tey seinastu 2 árini, og hjúnafelagarnir framvegis livdu saman við deyða skadda.
Stk. 3. Rætt til somu skiftisveiting hevur eisini ein eftirsitandi, sum fyri vanlukkutilburðin livdi saman við skadda eins og hjún, um tey, tá skaldi deyði, høvdu livað saman uttan slit tey seinastu 2 árini.
Stk. 4. Er eingin eftirsitandi, sum hevur rætt til skiftisveiting eftir stk. 1-3, kann sama veiting verða veitt øðrum eftirsitandi, tá ið serstakar umstøður tala fyri hesum.

§ 46. Tann, sum hevur rætt til skiftisveiting eftir § 45, stk. 1-3, og sum við deyða skadda hevur mist uppihaldara ella av hesum ávum er fyri verandi uppihaldsviðurskiftum, hevur rætt til endurgjald.
Stk. 2. Endurgjaldið er ein tíðaravmarkað útgjalding, ið er 30% av árslønini hjá tí deyða, samhvørt § 54, og verður henda veiting goldin við 1/12 um mánaðin tann 1. í hvørjum mánað. Tíðarskeiðið kann í mesta lagi verða 10 ár. Verður eftirsitilsin útgoldin vegna deyðan, kemur veitingin til útgjaldingar aftaná eftirsitilsmarskeiðið.
Stk. 3. Veitingin samhvørt stk. 2 er ábroytt í tí ásetta tíðarskeiðinum, uttan so at hon heilt ella partvis verður gjørd til peningsogn, ella tann, sum hevur rætt til veitingina doyr.
Stk. 4. Síðst í mánaðinum, tá ein, ið hevur rætt til

nevnda endurgjald fyllir 67 ár, verður tann framhaldandi veitingin at gjalda einaferð með alla svarandi til 2 ferðir ta árligu veitingina. Er ein, ið hevur rætt til endurgjald, tá avgerðin verður tikin, fyltur 67 ár, verður endurgjaldið útgoldið sum tilskilað undir pkt. 1.

Stk. 5. Endurgjald fyri miss av uppihaldara kann í serligum førum verða gjørt um til peningaupphædd eftir umsókn frá tí, sum hevur rætt til endurgjald.

Stk. 6. Er ein, sum er eftirsitandi ikki hildin at hava rætt til endurgjald eftir stk. 1, kann viðkomandi innan eina freist uppá 5 ár frá móttøkuni av boðunum um hetta, krevja endurgjaldsspurningin uppaftur tiknan. Á sama hátt kann ein, sum er eftirsitandi, sum hevur fingið tillutað endurgjald eftir stk. 1, smb. stk. 2, innan eina freist uppá 5 ár eftir at veitingarnar eru hildnar uppat, krevja endurgjaldsspurningin uppafturtiknan við atliti til at fáa fleiri stigvísar útgjaldingar.

§ 47. Eru børn, ið deyði hevði uppihaldsskyldu av sambært lóg um almannaveiting, fær hvørt barnið eina veiting svarandi til 10% av árslønini hjá tí deyða, smb. § 54, um hitt av foreldrunum er á lívi, og annars 20%. Missir barnið seinni hitt av foreldrunum verður veitingin restina av tíðini hækkað upp til 20%.

Stk. 2. Fær barnið, tá tað fyllir 18 ár í útbúgving og umstøðurnar annars tala fyri hesum, kunnu veitingarnar verða longdar til útbúgvingin endar, tó ikki longur enn til viðkomandi er fyltur 21 ár. Sama rætt hevur barn hjá tí deyða, sum fyri deyðan var fyli 18 ár og var undir útbúgving.

Stk. 3. Um samlaðu veitingarnar eftir stk. 1 verða roknaðar til meira enn 50% av árslønini hjá tí deyða, lækka tær einstøku veitingarnar lutfalsliga til samanlagt 50% av árslønini hjá tí deyða, og verður samstundis veitt endurgjald eftir § 46, lækka tær niður í samanlagt 40%.

Stk. 4. Veitingarnar eftir stk. 1 og 2 verða útgoldnar frá deyðanum við 1/12 árliga tann 1. í hvørjum mánaði.

§ 48. Um tær samlaðu árligu veitingarnar eftir §§ 46 og 47 eru minni enn 70% av árslønini hjá tí deyða, kann tað innan fyri hesa rammu, tá serligar umstøður gera seg galdandi verða veitt endurgjald til onnur, sum deyði heilt ella partvís var forsyrgjari hjá, tá vanlukkutilburðurin hendi. Endurgjaldið kann burtursað frá stjúkbørnum hjá tí deyða undir 21 ár, verða goldið sum peningaogh sambært § 42.

§ 49. Ásetingarnar í § 44 hava samsvarandi gildi fyri endurgjaldspening, sum verður játtaður sambært §§ 45-48.

§ 50. Um útreiðslurnar av jarðarferð hins deyða (líkbrenning) verða hornar av teimum, ið eftir sita, eitt øðrum einstaklingum, eiga tey at fáa hjálp upp til kr. 20.000. Upphæddin verður javnað sambært § 54, stk. 3.

§ 51. Figur skaldi, sum avleiðing av vanlukkutilburðinum eftirløn eftir lóg um eftirløn hjá tænastumonnum, verður endurgjaldið fyri miss arbeiðsføri lækkað eftir hesi lóg. Lækkingin verður 2/3 av virðinum av tí peningahædd, sum tænastumannaeftirlønin er hækkað uppum ta eftirløn, ið svarar til tænastualdurin um tað mundið tá eftirlønarveitingin byrjar.

Stk. 2. Um so er, at arbeiðsskaðin elvir deyðan og tey eftirsitandi sostatt eiga rætt til eftirløn samsvarandi lóg um tænastumannaeftirløn, verður endurgjaldið lækkað fyri miss av uppihaldara eftir hesi lóg við 2/3 av tí peningahædd, har tænastumannaeftirlønin er hækkað upp um ta eftirløn, ið svarar til tænastualdurin hjá deyða við andlátið.

Stk. 3. Eitstni onnur, sum hava rætt til endurgjald eftir hesi lóg og samstundis hava rætt til eftirløn, koma undir reglurnar í stk. 1 og 2, um so er, at reglur svarandi til reglurnar í lóg um tænastumannaeftirløn eru galdandi fyri eftirlønarskipanina. Í hesum førum rindar tryggingarfelagið til eftirlønargevaran eina peningahædd, ið svarar til tann metta frádráttin hjá skadda ella teimum eftirsitandi eftir hesi lóg.

§ 52. Uttan so at annað er tilskilað í tryggingarskjalinum, kunnu vanlukkutilburðir, sum heimila krøv eftir teirri fyriskipaðu arbeiðsgevaratryggingini eftir hesi lóg ikki samstundis heimila krøv eftir sjálvkravdu tryggingunum sambært hesi lóg og heldur ikki teimum lógarkravdu tryggingunum sambært § 9. Eru veitingar útgoldnar skadda eftir fremmandari lóg av sama slag, verða veitingarnar á sama hátt niðursettar, um skaldi hevur teknað sjálvbodna trygging ella trygging sambært § 9.

§ 53. Dagpeningar og vanlukkutryggingarmentor verða goldin av tryggingarfelagnum til viðkomandi, uttan so at Vanlukkutryggingarnevndin, har sum hetta vegna umstøðurnar er eftirlýsskjandi, ger av, at hesi skulu verða goldin inn til Vanlukkutryggingarnevndina og síðani verða goldin tf avvarðandi. Van-

lukkutryggingarnevndin kann í slíkum førum eisini rinda tí viðkomandi endurgjøldini, og síðan krevja tann útlagda pening inn hjá tryggingarfelagnum.
Stk. 2. Tær peningaupphæddir, sum Vanlukkutryggingarnevndin sambært ásetingum í hesi lóg hevur játtað, skal tryggingarfelagið skjótast gjørligt, og í seinasta lagi áðrenn 14 dagar eru liðnir frá tí degi, avgerðin hjá Vanlukkutryggingarnevndini var kunnug, gjalda samsvarandi avgerðini.
Stk. 3. Tá ið útgjaldingin av dagpeningi og vanlukkutryggingarrentum ella inngjald av peningaupphæddum vegna kæru ella av aðrari grund fer fram seinni enn 14 dagar frá tí degi, avgerðin hjá Vanlukkutryggingarnevndini var kunnug, verður at gjalda rentu av upphæddini frá tí, at henda freist var liðin, svarandi til ta vanligu rættarmálsrentuna, sum ásett er eina og hvørja tíð.

§ 54. Sum ársløn verður roknað samlaða arbeiðsinntøka hjá skaddu árið frammanundan arbeiðsskaðan. Árslønin verður ásett eftir metan, tá ið serstøk setanarviðurskifti gera seg galdandi, ella tá skaddi vegna arbeiðssjúku ikki hevur verið í arbeiði fyri somu løn í undanfarna ár, ella um skaddi hevur verið úr arbeiði í einum styttri ella longri tíðarskeiði áðrenn fráboðanardagin um sjúkuna. Sama er fyri aðrar vanlukkutryggingar, um ikki annað er ásett í tryggingartreytunum, sambært stk. 2.
Stk. 2. Árslønin kann í mesta lagi roknast av eini upphædd uppá kr. 300.000 og í minsta lagi uppá kr. 150.000. Upphæddin verður javnað sambært ásetingunum í stk. 3.
Stk. 3. Upphæddirnar í § 38, § 45 og § 50 verða javnaðar eftir tí til eina og hvørja tíð galdandi sáttmála millum Føroya Arbeiðaralag og Føroya Arbeiðsgevaralag.

Kapittul 6
Ymiskar ásetingar

§ 55. Frágjørdur frá trygging er vanlukkutilburður, sum tann tryggjaði sjálvur hevur volt við vilja.
Stk. 2. Lógin fatar ikki um vanlukkutilburðir, sum standast av bersterði, burtursæð frá vanlukkutilburðir í sigling.

§ 56. Avtalur millum hin tryggingarskyldugu og tey, sum hava rætt til trygging, hava einki nettargildi, tí ið tær miða móti ella hava við sær, at tann tryggjaði skal rinda tryggingargjald, sum eftir lógini liggur á arbeiðsgevaranum, ella at skyldug gjøld ikki skulu roknast út eftir lógini. Somuleiðis eru avtalur um eftirhald av løn vegna tryggingar eftir hesi lóg ógildugar.

§ 57. Krav, sum ein tryggjaður ella tey, ið eftir sita, eiga sambært hesi lóg, kunnu ikki verða fyri lóghaldi, figgjartøku ella aðrari rættarsøkn. Rættargerðir, sum viðkomandi gera viðvíkjandi hesum krøvum, eru ógildugar.

§ 58. Fyri tryggingargjøld fyri vanlukkutryggingar teknaðar í tryggingarfelagnum er pantirættur, verða tey ikki goldin í rættari tíð. Fyri tryggingargjøld frá útgerðarmonnum eigur tryggingarfelagið sjóveðrætt í skipi og farmagjaldi eftir ásetingunum í sjólógini.

§ 59. Við sekt verður tann arbeiðsgevari revsaður, sum vanrøkir skylduna at tekna trygging eftir hesi lóg, ella sum ikki heldur tryggingina í gildi.
Stk. 2. Við sekt verður revsaður tann arbeiðsgevari ella tann, sum virkar hansara vegna, sum ikki í rættari tíð gevur fráboðan eftir § 17 um vanlukkutilburð ella hindrar læknaviðgerð í rættari tíð eftir § 22.

§ 60. Hevur arbeiðsgevari ikki teknað lógskylduga vanlukkutrygging ella ikki haldið slíka trygging í gildi, skal hann gjalda tryggingarfelagnum tað tryggingargjald, sum hann hevur sloppið sær undan at gjalda felagnum.

§ 61. Hevur vanlukkutilburður borist á, og hevur arbeiðsgevari tá borið seg undan at gera sína tryggingarskyldu, fargreiðir tryggingarfelógini eftir nærri reglum, sum landsstýrismaðurin í almanna- og heilsumálum ásetur. Sama er um persónar, sum § 6, stk. 3 fatar um.
Stk. 2. Arbeiðsgevarin skal endurrinda felagnum tað goldnu upphæddir, uttan so at Vanlukkutryggingarnevndin heldur, at serligar og fyrtgeviligar umstøður hava verið hjá arbeiðsgevaranum, at hann heilt ella lutvíst eigur at sleppa undan at gjalda. Pantingarrætt hevur felagið fyri upphæddina.
Stk. 3. Heimilað er Vanlukkutryggingarnevndini at geva arbeiðsgevaranum upphæddina aftur í somu mun, sum høskiligt tykir.

§ 62. Veitingar til persónar, sum eru tryggjaðir sambært § 3 í hesari lóg, rindar landskassin með alla, sama um trygging er ella eingin.

Kapittul 7
Gildiskomu- og skiftisreglur

§ 63. Henda lóg kemur í gildi ....., og fer samstundis úr gildi fyriskipan fyri Føroyar nr. 389 frá 15. november 1966 um trygging móti fylgjum av vanlukkutilburðum við seinni broytingum. Lógin fatar um vanlukkutilburðir, ið eru hendir eftir, at lógin er komin í gildi. Vanlukkutilburðir hendir fyri gildiskomu lógarinnar, eru fevndir av "anordning nr. 389 af 15.11.1966 om forsikring mod følger af ulykkestilfælde". Tó er kapittul 3 galdandi fyri allar vanlukkutilburðir, sum eru fráboðaðir aftaná gildiskomu lógarinnar.

Viðmerkingar

Galdandi fyriskipan "Anordning for Færøerne om forsikring mod følger af ulykkestilfælde" frá 15. november 1966 fatar um lógskyldugar vanlukkutryggingar, og verða mál hesum viðvíkjandi viðgjørd av Færøernes Ulykkesforsikringsråd við kærumøguleika til Den Sociale Ankestyrelse og í ávísum førum til sosialmálaráðið.

Sambært § 15 í fyriskipanini verða eisini vanlukkutryggingarmál viðvíkjandi sjálvboðnum tryggingum viðgjørd á sama hátt, um avtala er gjørd tryggingartakara og Føroya Vanlukkutrygging S/F millum, um at endurgjald verður at veita sambært fyriskipanini, og at partarnir geva seg undir avgerðina hjá ráðnum. Eisini í slíkum førum er kærurættur til Den Sociale Ankestyrelse.

Tey seinnu árini hevur Vanlukkutryggingarráðið eisini viðgjørt vanlukkutryggingarmál viðvíkjandi frítíðartryggingum, serstakliga viðvíkjandi ítróttarskaðum. Eisini í slíkum førum gevur tryggingartakarin seg undir avgerðina hjá Vanlukkutryggingarráðnum, men uttan møguleika fyri at kæra avgerðina.

Nevndin heldur, at øll vanlukkutryggingarmál eiga at verða viðgjørd á sama hátt og við sama møguleika at kæra avgerðina hjá Vanlukkutryggingarráðnum. Uppskotið fatar tí um allar vanlukkutryggingar, bæði lógskyldugar og aðrar.

Eisini má haldast, at galdandi fyriskipan er óneyðuga flókjaslig. Somu áskoðan høvdu teir í Danmark, tá ein nevnd varð sett niður til at gera uppskot til nýggja lóg, lóg nr. 79 frá 8. mars 1978 "om arbejdsskadeforsikring", sí "Betænkning nr. 792 vedrørende Arbejdsskadeforsikring".

Fyriliggjandi uppskot til nýggja vanlukkutryggingarlóg miðar eisini ímóti at gera eina einfaldari lóg enn galdandi fyriskipan.

Uppskotið er gjørt við álitinum frá 1988 sum grundarlagi, og eru partar av núgaldandi donsku lóg um arbeiðsskaðar likið við.

Uppskotið er í 7 pørtum og er uppbygt soleiðis:

Kapittul 1	Øki lógarinnar
Kapittul 2	Tryggingartilburðurin
Kapittul 3	Skipan av vanlukkutryggingini
Kapittul 4	Fráboðan, málsupplýsing og málsviðgerð
Kapittul 5	Veitingar
Kapittul 6	Ymiskar ásetingar
Kapittul 7	Loka- og skiftisreglur

Viðmerkingar til tær einstøku greinarnar:

1. Kapittul — Øki lógarinnar

ad § 1: Er einsljóðandi við § 1 í donsku lógini um "arbejdsskadeforsikring" hert við teirri broyting, at í staðin fyri "her i landet" og "dansk skib" er sett "på Færøerne" og "færøsk skib". Tilskilað er eisini her, at lógin

fatar eisini um vinnusjúkur, og er tað tí ikki neyðugt at viðmerkja undir hvørji einstakari grein aftan á "ulykkestilfælde". Danska lógin nytir ikki orðið "ulykkestilfælde", men hinafturímóti "arbejdsskade", sum í sjálvum sær fatar um vinnusjúkur. Ein broyting er eisini, at arbeiðsgevarans hjúnafelagi er tryggjaður, um ein lønaravtala er gjørd, men er henda broyting treytað av at tað er skattliga møguligt.

3. stk. er tikið eftir § 7, 1. stk. í galdandi fyriskipan, tó við tí uppískoyti, at persónar, sum verða sendir uttanlands og har koma undir trygging, sum er eins góð og tann føroyska, ikki koma undir føroysku tryggingina.

4. stk. er sett í uppskotið eftir tilmæli frá Sikringsstyrelsen.

5. og 6.stk er einsljóðandi við grein 1, 3. og 4. stk. í donsku lógini. Ein treyt fyri at barnið hevur rætt til endurgjald er, at arbeiðið hjá mammuni er umfatað av lógini.
Viðmerkjast kann, at kunngerðin um vinnusjúkur eigur at innihalda ásetingar um hvørjar fosturskaðar kunnu viðurkennast sum vinnusjúkur, har barnið er tað, sum hevur rætt til endurgjald.

ad § 2 1. stk er einsljóðandi við § 2 í donsku lógini bert við teirri broyting, at víst verður til § 1, og kemur hetta av, at uppskotið snýr seg um allar vanlukkutryggingar, meðan danska lógin bert viðvíkur lógskyldugum vanlukkutryggingum.

2. stk. snýr seg um ferðing til og frá arbeiðsstaði og er tikið eftir § 3, 1. stk. í galdandi fyriskipan. Í Danmark er arbeiðstakari ikki tryggjaður til og frá arbeiði.

ad § 3 Einsljóðandi við § 3 í donsku lógini, sbr. eisini § 3, 1. stk. í galdandi fyriskipan. Víst verður til § 62 í uppskotinum um, at tryggingarfelagið skal rinda veitingarnar uttan mun til, um trygging er ella ikki. Tó verða veitingar, ið verða útgoldnar eftir grein 3, 3. stk., bjarging av mannalívum, rindaðar av landsstýrinum. Henda broyting fyrir eisini við sær, at álitisfólk eru tryggjað sambært lógini undir øllum teirra virksemi sum álitisfólk.

ad § 4 Greinin er nýggj og lungar saman við, at uppskotið fatar um allar vanlukkutryggingar, ikki bert lógskylduga vanlukkutrygging.

2. stk. viðger spurningin um veitingar, tá skylda til at tekna persónliga vanlukkutrygging sambært § 9 er til staðar, men eingin trygging er teknað. Eitt er, at slíkur persónur fær veitingar fyrt vanlukkutilburðir í sambandi við hansara starv sum sjómaður ella í starv innan landbúnað, men at hann í slíkum førum eisini skuldi fingið veitingar fyri vanlukkutilburðir á landi, herundir í frítíðini, verður ikki hildið at verið rímuligt.

ad § 5 Er samsvarandi § 2, 4. stk. í galdandi fyriskipan bert við teirri broyting, at heimildin til at gera kunngerð er hjá landsstýrinum.

ad § 6 Er samsvarandi § 5 í donsku lógini, tó við teirri broyting, at tímatalið í 3. stk. er sett til 100. Í donsku lógini er tað 400, og í galdandi fyriskipan er tímatalið 240.

ad § 7 Er samsvarandi § 61 í galdandi fyriskipan og § 6 í donsku lógini.

ad § 8 Er samsvarandi § 7 í donsku lógini, sbr. eisini § 19, 1. og 2. stk. í galdandi fyriskipan.

ad § 9
1. stk. er samsvarandi § 8 í donsku lógini, tó eru 3/5 broytt til 1/5 eins og í § 58, 1. stk. í galdandi fyriskipan.
2.stk. Henda grein kemur eftir uppskotinum at fata um allar útróðrarmenn, ið reka fiskivinnu fyri egnu rokning, meðan praksis eftir galdandi fyriskipan hevur verið, at allir sjómenn hava verið umfataðir av hesi trygging, nevnd heimatrygging.

Uppskot um broyting av grein 9 varð lagt fram av Ellinti Abrahamsen.

Samtykt var tó ikki at taka uppskotið til eftirlektar, men eftir ynski frá Ellinti Abrahamsen er tað viðlagt, sum skjal 1 til viðmerkingar.

2. Kapittul — Tryggingartilburðurin

ad § 10
1. stk. er nýtt og er sett í uppskotið, tí tað fatar bæði um lógskyldugar og aðrar vanlukkutryggingar.

2. stk. er eisini nýtt og er ein roynd at lýsa, hvat ein vanlukkutilburður er fyri nakað. Lýsingin er tikin frá Hagen í kommenteraðu táverandi donsku vanlukkutryggingarlógini bls. 18. Henda lýsing er samsvarandi praksis hjá vanlukkutryggingarráðnum. Hendan praksis gongur út upp á, at fyri at ein tilburður kann góðkennast sum vanlukkutilburður, má vera hent nakað óvanligt frá vanligari arbeiðsgongd. Um ein maður t.d. fær ilt í ryggin, tá hann lyftir okkurt ella missir brillur ella handilstenn, verður slíkt bert góðkent, um hann t.d. er áhaldsin og dettur, ella hann verður raktur av onkrum.

Ellintur Abrahamsen ynskti aðra orðing, har ein vanlukkutilburður varð lystur at vera ein og hvør skaðatilburður, ið hendir á einum arbeiðsplássi. Avgjørt var at halda fast við verandi orðing.

3. stk. er samsvarandi § 1, 2. stk. í galdandi fyriskipan, tó er í staðin fyri "nakrar dagar" ásett til "5 dagar".

ad § 11
1. stk. er ein staðfesting av at lógin fatar um vinnusjúkur og er ein greining av vinnusjúkum tikin úr grein 10 í donsku lógini.

2. stk. er nýtt og er ein staðfesting av at landsstýrið eftir tilmæli frá Vanlukkutryggingarráðnum lýsir við kunngerð tær sjúkur, ið kunnu viðurkennast sum vinnusjúkur.

3. stk. er svarandi § 10, 2. stk. í donsku lógini.

4. stk. er samsvarandi § 1 B í galdandi fyriskipan og § 11, 1. stk. í donsku lógini. Henda grein staðfestir, at tær í kunngerðini umrøddu vinnusjúkur geva krav uppá endurgjald uttan so, at tað verður hildið mest sannlíkt, at sjúkan kemur av øðrum enn arbeiði hins tryggjaða.

5. stk. er samsvarandi § 11, 2. stk. í donsku lógini, og staðfestir at skaðadato fyri vinnusjúkur er tann dagur, sum sjúkan verður fráboðað.

ad § 12 er samsvarandi § 13 í donsku lógini og § 1 B í galdandi fyriskipan.

3. Kapittul — Skipan av vanlukkutrygging

ad § 13
1.stk. er samsvarandi § 45 í donsku lógini og § 17 í galdandi fyriskipan. Tó er tryggingarskyldan eisini áløgd kommunum.

2. stk. verður ásett at øll, ið hava tryggingarskyldu skulu tekna tryggingarnar í einum tryggingarfelag, sum hevur loyvi til at tekna lógarkravdar vanlukkutryggingar í Føroyum.

Hetta er soleiðis ein ásannan av, at einkarætturin hjá Føroya Vanlukkutrygging S/F at tekna hesar tryggingar er tikin av.

§ 14 og 15 Hesar greinar eru nýggjur við tað at mælt verður til at broyta skipanina av vanlukkutrygging. Síðani vanlukkutryggingin varð yvirtikin sum sermál, hevur Den Sociale Ankestyrelse virkað sum kæru-

stovnur viðvíkjandi avgerðunum hjá Vanlukkutryggingarráðnum. Hóast henda skipan hevur riggað hampuliga væl burtursæð frá, at málsviðgerðin eitt skifti tók langa tíð, so heldur arbeiðsbólkurin, at ein føroyskur kærustovnur eigur at verða settur á stovn. Vanlukkutryggingarlóggávan er ymisk í Danmark og Føroyum, og mett verður tí, at Den Sociale Ankestyrelse, sum fráhøður, ikki kemur at hava so góðar fyritreytir at taka avgerð í hesum málum. Eisini heldur arbeiðsbólkurin , at tað er tørvur á, at avgerðir viðvíkjandi t.d. fríttíðartryggingum eiga at kunna kærast.

Eftir lógaruppskotinum verður mælt til at broyta Vanlukkutryggingarráðið frá at vera 1. instansur til at verða kærustovnur. Veljast skal tí ein nýggj nevnd, kallað Vanlukkutryggingarnevndin, ið kemur at taka avgerðir, sum 1. instansur. Skotið verður upp, at nevndin verður mannað soleiðis:

1. formann, sum skal hava lokið læknafrøðiligt embætisprógv
2. eitt umboð valt av tryggingartakarunum
3. eitt umboð valt av teimum tryggingarskyldugu arbeiðsgevarunum
4. skrivari, ið skal hava lokið løgfrøðiligt prógv.

Nevndin kemur at halda til hjá teimum feløgum, ið hava loyvi til at tekna lógarkravdar tryggingar, og koma feløgini sostatt at virka sum sekretariat hjá nevndini.

Útreiðslurnar til Vanlukkutryggingarnevndina bera feløgini.

Avgerðir hjá Vanlukkutryggingarnevndini kunnu skjótast inn fyri Vanlukkutryggingarráðið, hvørs avgerðir ikki kunnu skjótast inn fyri annan fyrisitingarmyndugleika.

Samhært uppskotinum verða allar avgerðir í vanlukkutryggingarmálum tiknar av Vanlukkutryggingarnevndini og Vanlukkutryggingarráðnum eisini í førum, har avgerðin fyrr var hjá sosialmálaráðnum. Uppreksingin í § 12 í galdandi fyriskipan er tí ikki endurtikin í uppskotinum.

Reglan í § 12. 2. stk. í galdandi fyriskipan er tikin burtur, tá hesar reglur eru at finna í Fyrisitingarlógini.

ad § 16 Samsvarar við § 14 í galdandi fyriskipan.

4. Kapittul — Fráboðan, núlsupplýsing og málsviðgerð

ad § 17 Samsvarandi við § 45 í galdandi fyriskipan.

ad § 18 Samsvarandi við § 46 í galdandi fyriskipan.

ad § 19 Samsvarandi § 18 í donsku lógini og verður í hesi grein álagt læknum og tannlæknum at koma við fráboðanum um vinnusjúkur.

Ein slík fráboðanarskylda er ikki eftir galdandi fyriskipan. Tað eru eisini heilt fáir tilburðir av vinnusjúkum, ið verða fráboðaðir. Sama var í Danmark undir gomlu lógini, men nú er talið av fráboðanum vaksið munandi í Danmark.

ad § 20 Samsvarandi § 47 í galdandi fyriskipan bert við teirri broyting, at tíðarfreistin er broyt frá eitnum ári til 5 ár, ið er í samsvar við donsku lógina.

ad §§ 21-22 Samsvarandi §§ 21-22 í donsku lógini, sbr. eisini § 50 í galdandi fyriskipan.

ad § 23 Samsvarandi § 23 í donsku lógini, sbr. eisini § 50, 4. og 5. stk. í galdandi fyriskipan.

ad § 24 Samsvarandi § 48 í galdandi fyriskipan bert við teirri broyting, at takstirnir fyri umroddu læknaváttanun verða ásettir av vanlukkutryggingarnevndini.

ad §§ 25-26 Samsvarandi §§ 23-24 í donsku lógini og eru ásetingar um tíðarfreistina í sambond við fráboðan av vanlukkutilburðum ella vinnusjúkum.

5. Kapittul — Veitingar

ad §§ 27-28 Samsvarandi §§ 20 og 22 í galdandi fyriskipan.

ad §§ 29 og 30 Samsvarandi § 23 í galdandi fyriskipan við tebri broyting, at dagpeningur verður veittur frá 3. degi aftaná vanlukkutilburðin. Tó verður nú staðfest at dagpengar ikki verða útgoldnir um skuddi hevur krav uppá løn, dagpengar ella veiting frá Lønjavningargrunninum..

ad § 31 Samsvarandi § 25 í fyriskipanini við tebri broyting, at grundarlagið eftir uppskotinum nú er øðrvísi.

ad §§ 32 – 36 Samsvarandi §§ 26 - 31 í galdandi fyriskipan. Tó er nýtt stk. 2. sett inn í § 36, ið heimilar at ásetta eitt fyribils avlamisendurgjald, um endalig støða ikki kann takast um varandi avlamni innan 3 ár.

ad § 37 og 38 Samsvarandi § 32 og 33 í donsku lógini. Eftir galdandi fyriskipan verður veitt endurgjald fyri avlani út frá eini metan um læknafrøðiligt avlamni og mistari arbeiðsorku. Endurgjaldið kundi í minsta lagi verða 5% og í mesta lagi 100%.

Eftir kógaruppskotinum verður endurgjald fyri avlani býtt upp í tveir partar, nevnliga endurgjald fyri mist arbeiðsføri og endurgjald fyri varandi mein. Endurgjald fyri mist arbeiðsføri verður latið út frá eini metan um í hvønn mun arbeiðsorkan er skerd, meðan varandi mein verður ásett eftir einum læknafrøðiligum stiga. Endurgjald fyri mist arbeiðsføri kann í minsta lagi verða 15% og í mesta lagi 100%, meðan endurgjald fyri varandi mein í minsta lagi skal vera 5% og í mesta lagi 100% og kann í serligum føri ásetast til 120%.

Henda broyting kemur at føra við sær, at avlami eftir ein arbeiðsskaða kann ásetast meira neyvt út frá tí skaða ein hevur fingið, og kann annars sigast, at broytingin førir við sær at í flestu førum vil eitt minni avlami fáa eitt minni endurgjald, meðan teir støru avlamisskaðarnir vilja fáa eitt støri endurgjald enn eftir galdandi fyriskipan.

ad § 39 Samsvarandi § 33 í gahlandi fyriskipan

ad § 40 Samsvarandi § 34 í galdandi fyriskipan

ad § 41 Samsvarandi § 35 í galdandi fyriskipan

ad § 42 Samsvarandi § 36 í galdandi fyriskipan, við tí broyting at gjølligari reglur fyri broyting frá rentu til peningsogn, verður gjørd av landsstýrinum eftir tilráðing frá vanlukkutryggingarnevndini.

ad § 43 Samsvarandi § 37 í galdandi fyriskipan.

ad § 44 Samsvarandi § 38 í galdandi fyriskipan.

ad §§ 45, 46, 47 og 48 Samsvarandi §§ 35, 36 og 43 í donsku lógini og samsvarandi við § 39 í galdandi fyriskipan, tó við tveimum rættiligum tydandi broytingum. Fyri tað fyrsta talar uppskotið ikki um einkjur, men um hjúnafelaga, t.v.s. at maður og kona verða javnstillað. Fyri tað annað verður persónur, sum tann deyði hevur livað saman við í 2 ár ella meira, hóast tey ikki vóru gift, javnstillaður við hjúnafelaga. Hevtir samlivið verið styti, ger ráðið í hvørjum einstøkum føri av, um endurgjald skal veitast og hvussu stórt.

Ein broyting frá galdandi fyriskipan er eisini, at endurgjald við deyð er býtt upp í tvinna sløg av endurgjaldi, nevnliga,

1. **skiftisveiting við deyð**, ið verður útgoldin í einum og er ein nýggj veiting í mun til galdandi skipan
2. **endurgjald fyri miss av uppihaldara**, ið er ein árlig veiting uppá 30% av lønini til hjúnafelaga og 10% til børn undir 18 ár. Henda upphædd var ávikavíst 3,6 og 1,35 falda ársløniná. útgoldið í einum, eftir galdandi skipan.

Ein broytling eftir uppskotinum er eisini, at útgjaldast kann til onnur enn næstu avvarðandi.

ad § 49 Samsvarandi § 40 í galdandi fyriskipan.

ad § 50 Samsvarandi § 41 í galdandi fyriskipan við teirri broyting, at veitast kann upp til kr. 20.000, sum verða at prístalsviðgera.

ad § 51 Samsvarandi § 39 í donsku lógini og ásetur at um ein ið kemur fyri skaða er umfatað av tænastumannaeftirløn, verður endurgjaldið minkað eftir ávísum reglum.

ad § 52 Sambært § 42, 6. stk. í galdandi fyriskipan kunnu vanlukkutilburðir, sum veitt verður endurgjald fyri sambært tvungnari trygging ikki grundað á veitingar eftir sjálvbodnum tryggingum. Um ein fiskimaður, sum hevur teknað trygging sambært § 9, 1. stk. fer við skipi og kemur til skaða umborð, fær hann veitingar eftir medhjálpartryggingini hjá skipinum, men ikki eftir teirri trygging, hann sjálvur hevur teknað. Sama er, um tað er um aðrar sjálvbodnar tryggingar, sum eru umfatað av fyriskipanini, sbr. § 15 í galdandi fyriskipan.

Er talan harafturímóti um sjálvbodnar tryggingar, sum ikki eru umfatað av fyriskipanini, er tað neyvan nakað til hindurs fyri, at veitt verður endurgjald sambært slíkum tryggingum við síðuna av endurgjaldi sambært lógskyldugari trygging.

Uppskotið er ætlað at fata um allar vanlukkutryggingar, og tí verður ásett, at henda regla framvegis er galdandi, uttan so at annað er avtalað í tryggingartreytunum.

ad § 53 Samsvarandi § 4 í galdandi skipan.

ad § 54 Eftir galdandi fyriskipan verður veittur ymiskur daggpeningur og ymisk endurgjald alt eftir inntoku hjá viðkomandi innan fyri tey seinastu 3 árini, tó innan fyri eitt ávíst lágmark og eitt ávíst hámark. Nevndin heldur, at tann løn ið verður grundarlagið undir veitingunum skal verða so lík verufigu lønini hjá skadda sum møguligt. Hugsast má um, at tá veitt verður endurgjald fyri varandi mist arbeiðsføri, má hetta endurgjald eisini í so stóran mun sum møguligt, verða ásett út frá tí verufigu lønini hjá skadda. Nevndin mælir tí til at áseta mestu lønina ið roknað verður eftir til kr. 300.000,00 og minstu upphæddina til kr. 150.000,00. Mælt verður til at javna upphæddirnar eftir lønarsáttmálanum hjá Føroya Arbeiðsgevarafelag og Føroya Arbeiðarafelag.

Møguleiki eigur tó at verða at tekna sjálvbodnar tryggingar sambært § 52 fyri at fáa hægri veitingar, men hesar tryggingar eru arbeiðsgevaranum óviðkomandi. Eisini heldur nevndin, at tá talan er um aðrar sjálvbodnar tryggingar, eigur at verða møguleiki fyri at tekna bæði hægri og lægri veitingar enn eftir 1. stk., men tað skal greitt framganga í tryggingartreytunum, hvat er avtalað millum Føroya Vanfukkutrygging S/F og tryggingartakaran.

Víst verður annars til fylgiskjal 2, ið vísir avleiðingarnetingar av at seta árslønina til kr.300.000,00. Gjørt verður tó vart við, at tølini skulu takast við einum ávísum fyrivarni, tí tey eru grundað á 1993. Nevnast kann, at frá 1988-1991 vóru 3 mál avgjørd við einum avlarnisstigi uppá 100%, meðan í tíðarskeiðinum 1991-1996 einki mál varð avgjørt við meira enn 60% avlarnni.

Eftir galdandi skipan verður útgoldið umleið 1,2 mill. kr. fyri ein 100% avlarnisskaða, meðan upphæddin eftir uppskotinum verður umleið 4 mill. kr.

ad § 55 Samsvarandi § 3, 2. stk. í galdandi fyriskipan, tó er tann broyting, at endurgjaldið verður ikki minkað, um skaddi hevur vist grovt ósketni.

ad § 56 Samsvarandi ávikavist § 5 í galdandi fyriskipan.

6. Kapittul — Ymiskar ásetingar

ad § 57 Samsvarandi § 6 í galdandi fyriskipan.

ad § 58 Samsvarandi § 19, 3. stk. í galdandi fyriskipan.

ad §§ 59, 60 og 61 Sambært galdandi fyriskipan kann arbeiðsgevari, sum, ikki heldur skyldur sínar at tekna og halda í gildi lógskyldugar vanlukkutryggingar, fáa sekt, men aðrar avleiðingar eru ikki.

Eftir uppskotinum skal hann rinda tryggingargjøldini, sum hann skuldi havt rindað, um hann hevði gjørt sína skyldu og harmæst verður tað álagt honum at endurrinda tær veitingar, tryggingin noyðist at rinda, hóast eingin trygging er teknað. Vanlukkutryggingarnevndin hevur tó møguleika fyri at frítaka arbeiðsgevaran, um nóg góðar grundir eru til tess, ella linka endurgjaldsskylduna.

ad § 62 Samsvarandi § 63 í donsku lógini og áleggur landskassanum at rinda fyri skaðar, ið koma av at reynt verður at bjarga mannalívi, sama um trygging er ella eingin.

ad § 63 Áseting um hær lógin kemur í gildi. Lógin kemur at fata um allar skaðar, sum henda aftaná ígildisdagin. Fyri skaðar, ið verða fráboðaðir aftaná ígildisdagin, men eru hendir áðrenn ígildisdagin, komu undir galdandi fyriskipan. Tó verður grein 3 í nýggju lógini at galda fyri hesar skaðar. Skaðar, ið eru avgjørdir áðrenn ígildisdagin og verða uppaftur tiknir aftaná ígildisdagin, verða avgreiddir eftir reglunum í galdandi fyriskipan.

Umboðini fyri Reiðarafelagið og Arbeiðsgevarafelagið hava av prinsipiellum grundum verið ímóti broytingum — í t.d. §§ 30, 38, 50 og 54 — sum bera við sær støri útreiðslur fyri reiðarar og arbeiðsgevarar.

Íhjálagt:
Skjal 1.— Skriv frá Ellinti Abrahamsen.

Føroya Vanlukkutrygging, Att. Mortan Poulsen, Stjóri og Skrivari í arbeiðsbólkinum til endurskoðan av vanlukkutryggingarskipanini.

Viðv. heimatrygging av sjómonnum:

Víst verður til tað nógva tósið, ið hevur verið um tryggingarskylduna hjá sjófólki.

Biðið verður hervið um at fáa niðanfyri skrivaða sett inn í § 9 í lógaruppskotinum og tikið til endaliga viðgerð á næsta fundi.

§ 9. 1. stk. Hvør tann, sum annaðhvørt rekur egið sjófar ella mynstrar við skipi, ið er ella eigur at verða skráset í føroysku skipaskránni, hevur tryggingarskyldu.

2. stk. Fritikin fyri tryggingarskyldu kann tó verða tann, ið prógvar, at minni enn 1/5 av inntøkuni hjá viðkomandi er frá sjóvinnu, ella at viðkomandi er fevndur av øðrari trygging, ið er skipað eftir hesi lóg, ið annaðhvørt viðkomandi sjálvur hevur teknað, ella viðkomandi hevur teknað gjøgnum sítt fakfelag.

3. stk. Tann, ið krevur at verða fríttkin fyri tryggingarskyldu, skal sjálvur boða tryggingarfelagnum frá ti.

4. stk. Tá sjófólk,ið lýkur treytirnar í stk. 2, hevur kravt at vera fríttkið fyri trygging, hevur tryggingarfelagið ongu skyldu mótvegis viðkomandi, so leingi treytirnar í stk. 2 eru uppfyltar.

5. stk. Tá ein, ið hevur kravt at verða fíttkin fyri tryggingarskyldu ikki longur lýkur treytirnar í stk. 2, men er fevndur av stk. 1 tekur tryggingarskyldan viðaftur.

6. stk. Føroya Landsstýri áleggur Toll og Skattastovu Føroya, hvørt á fyrst í januar mánaði at senda tryggingarfeløgunum, ið tekna vanlukkutryggingar, yvirlit yvir teir persónar, sum hava í minsta lagi 1/5 av inntøku síni frá sjóvinnu.

Til tann partin av sjálvstøðugt vinnurekandi, ið ikki eru sjófólk, havi eg, í skrivandi løtu, ongu støðu.

Fuglafjørður 14. aprfl 1997, Ellintur M. Abrahamsen

Skjal 2.- Avleiðingarmetingar av ársløn uppá kr. 300.000,

Totalyvirlit

	Gomul lóg	Nýggj lóg				
	152.700	152.700	200.000	250.000	300.000	Viðmerking
Skiftisveiting við deyð (altí 88.000)	*****	176.000	176.000	176.000	176.000	Fast upphædd
Miss av uppihaldara, hjúnarfelagi	1.099.440	916.200	1.200.000	1.490.852	1.515.435	Roknað av løn
Miss av uppihaldara, barn 1	305.400	499.024	653.600	812.382	826.733	Roknað av løn
Miss av uppihaldara, barn 2	81.122	185.072	242.400	301.392	306.994	Roknað av løn
Jarðarferðarhjálp (altíð 5.750)	11.500	11.500	11.500	11.500	11.500	Fast upphædd
Deyðsendurgjald falt	1.497.462	1.787.796	2.283.500	2.792.136	2.836.662	
Avlamisendurgjald	1.731.217	*****	*****	*****	*****	Roknað av løn
Varandi mein	*****	759.000	759.000	759.000	759.000	Fast upphædd
Miss av virnuføri	****	950.481	1.054.184	1.139.432	1.193.589	Roknað av løn
Avlamisendurgjald falt	1.731.217	1.709.481	1.813.184	1.898.432	1.952.589	
Dagpengar frá 15. degi	4.830.417	4.441.405	5.144.675	5.621.321	5.869.638	Roknað av løn
	8.059.096	7.938.683	9.241.359	10.314.889	10.658.889	

Totalyvirlit

	Gomul lóg	Nýggj lóg				
	152.700	152.700	200.000	250.000	300.000	Viðmerking
Skiftisveiting við deyð (altí 88.000)	*****	176.000	176.000	176.000	176.000	Fast upphædd
Miss av uppihaldara, hjúnarfelagi	1.099.440	916.200	1.200.000	1.490.852	1.515.435	Roknað av løn
Miss av uppihaldara, barn 1	305.400	499.024	653.600	812.382	826.733	Roknað av løn
Miss av uppihaldara, barn 2	81.122	185.072	242.400	301.392	306.994	Roknað av løn
Jarðarferðarhjálp (altíð 5.750)	11.500	11.500	11.500	11.500	11.500	Fast upphædd
Deyðsendurgjald falt	1.497.462	1.787.796	2.283.500	2.792.136	2.836.662	
Avlamisendurgjald	1.731.217	*****	*****	*****	*****	Roknað av løn
Varandi mein	*****	759.000	759.000	759.000	759.000	Fast upphædd
Miss av virnuføri	****	950.481	1.054.184	1.139.432	1.193.589	Roknað av løn
Avlamisendurgjald falt	1.731.217	1.709.481	1.813.184	1.898.432	1.952.589	
Dagpengar frá 15. degi	4.830.417	2.399.126	2.813.771	2.860.020	2.957.421	Roknað av løn
	8.059.096	5.896.403	6.777.454	7.550.588	7.746.672	

Føroya Vanlukkutrygging, Yviri við Strond 23, 100 Tórshavn, Att. Mortan Poulsen, Skrivari í arbeiðsbólkinum, ið hevur tilevnað uppskot til nýggja vanlukkutryggingalóg.

Dagfesting: 13. juni 1997

Broyting til § 30, 3 stk. í lógaruppskoti fyri nýggja VANLUKKUTRYGGINGARLÓGGÁVUNI:

Undir lógararbeiðinum bað undirritað at fáa niðanfyri tilskilaðu broyting inn í lógina, men tí var tað ikki semja fyri:

Tá tað ikki var møguligt at fáa broytingaruppskotið inn á lógina, og tá tað ikki er komið við í viðmerkingunum, verður hervið biðið um at fáa tað inn í viðmerkingarnar til lógina.

Verðandi § 30, d. stk.
3. stk. Dagpeningurin verður ikki latin fyri tíðarskeið, tá ið hin tryggjaði eigur dagpening eftir dagpeningalóggávuni, ella eftir lóggávuni um lønjavningargrunn fiskimanna.

Broytingaruppskot til §30, 3. stk.
3. stk. Fyrstu 120 dagarnar av útgjaldstíðini verður dagpeningur ikki latin tá hin tryggjaði eigur rætt til løn frá arbeiðsgevara sínum.

Um skadd fær dagpening frá fleiri enn tryggingarfelagnum, t.d. Lønjavningargrunninum og dagpeningaskipanini og tað ger, at tryggjaði fær meir enn tryggjaði hevði fingið um viðkomandi ikki var skaddur, so skal meirupphæddin mótroknast í veitingini frá tryggingarfelagnum.

Við Heilsan, Ellintur M. Abrahamsen

1. viðgerð hósdagin 19. februar 1998. Uppskotið varð beint í trinnaðanevndina

Málið fall burtur sbr. stýrisskipanarlógini § 15 stk. 3, tí at løgtingsval var 30. apríl 1998, og málið ikki var liðugt viðgjørt á tingi fyri valið.

F.L.j.nr. 1020-4/92

67 Uppskot til samtyktar um framhald av Skotlandssiglingini

Ár 1998, friggjadagin 13. februar, legði Helena Dam á Neystabø, løgtingsmaður, vegna Sjálvstýrisflokkin fram soljóðandi

Uppskot
til
samtyktar
um framhald av Skotlandssiglingini

Heitt verður á løgmann, sum landsstýrismann í samferðslumálum, at leggja fyri Føroya løgting løgtingslógaruppskot um stovnan av felag, sum skal tryggja, at sambandið sjóvegis millum Føroyar og Skotland ikki dettur niður fyri.

Viðmerkingar
Meðan Sjálvstýrisflokkurin sat í samgongu saman við Verkamannafylkingini, Sambands- og Javnaðarflokk-

inum og seinni, tá ið Fólkaflokkurin loysti Javnaðarflokkin av, vísti Sjálvstýrisflokkurin ferð eftir ferð á, at almeyðugt var við fløgum í flutningskerv okkara, bæði innanlands og til onnur lond. Tað var tó ikki møguligt at vinna undirtøku fyri at seta pening av til at bøta um hesi viðurskifti, hóast tað var greitt, at tað t.d. ikki bar til at røkja framhald av Skotlandsrutuni við verandi skipi.

Tá í Fólkaflokkurin kom í samgongu 11. juni 1996, varð samgonguskjalið tikið til viðgerðar av nýggjum. Í hesum sambandi bleiv sett inn í samgonguskjalið, at flutningurin sjóvegis til umheimin skuldi vera á privatum hondum.

Ætlanin hjá táverandi landsstýrismanni í samferðslumálum at skipa siglingina í eitt partafelag, sum bæði almennur og privatur kapitalur stóð aftanfyri, vann ikki fram. Avleiðingin av hesum bleiv, at almenni farma- og ferðafólkaflutningurin til Skotlands varð niðurlagdur, og farmaleiðin latin P/F Skipafelagnum Føroyar at røkja.

Serstakliga vóru tað kreftir innan Sambands- og Fólkaflokkin, sum ikki vildu hoyra talan um, at tað almenna skuldi hava ábyrgdina av hesi fyri Føroyar og fyri útflutningsvinnuna almeyðugu farleið.

Eitt uppskot um at játta eina upphædd uppá umk. 13 miðlhónir, svarandi til søluprisin fyri Teistan, sum innskot í eitt partafelag, fall í løgtinginum.

Tað var eyðsæð, at Sambands- og Fólkaflokkurin vildu lívga Skipafelagnum, sum í nógv ár hevði vist sína ónøgd við, at tað almenna fíggjaði farma- og ferðaflutning til Skotlands. Landsstýrismaðurin hevði tá ikki annað í at velja, enn at gera avtalu við Skipafelagið.

Skipafelagið hevur nú boðað frá, at teir fara at gevast á hesi farleið, og mugu tí bæði Sambands- og Fólkaflokkurin ásanna, at teirra koyst miseydnaðist. Løgmaður, sum sjálvur var heitasti talsmaður fyri, at Skipafelagið skuldi røkja Skotlandsrutuna, umsitur nú samferðslumál, men einki røkist fyri, at hann ætlar at gera nakað í hesum máli.

Sjálvstýrisflokkurin vil tí einaferð enn royna, um meiriluti fæst á Føroya løgtingi fyri, at farleiðin millum Føroyar og Skotland kann halda fram.

1. viðgerð fríggjadagin 20. februar 1998. Uppskotið varð beint í mentanarnevndina.

Málið fall burtur sbr. stýrisskipanarlógini § 15 stk. 3, tí at løgtingsvat var 30. apríl 1998, og málið ikki var liðugt viðgjørt á tingi fyri valið.

68 Avtala um fyrisiting av várgýtandi norðurhavssildini

Ár 1998, fríggjadagin 13. februar legði Edmund Joensen, løgmaður, vegna Føroya landsstýri fram soljiðandi

U p p s k o t
til
samtyktar

Vísandi til § 52 í løgtingslóg nr. 103 frá 26. juli 1994 um stýrisskipan Føroya og til §§ 23, 24 og 26 í løgtingslóg nr. 28 frá 10. mars 1994 um vinnuligan fiskiskap við seinni broytingum, góðkennir løgtingið hjáløgdu avtalu um fyrisiting av várgýtandi norðurhavssildini.

Viðmerkingar
Tann 28. oktober 1997 varð semja gjørd millum strandalondini Føroyar, Ísland, Noreg, Russland og ES um eina skipan um fyrisiting av várgytandi norðurhavssildini fyri 1998.

Norðurhavssildin er vaksin og tykist at taka upp sítt vanliga ferðingarmynstur. Fyri 1996 komu tey 4 strandalondini Ísland, Føroyar, Noreg og Russland ásamt um eina heildarveiðu, men ES ásetti sær sjálvum eina sildakvotu. Í desember 1996 varð ein 5-landa avtala gjørd millum strandalondini Føroyar, Ísland, Noreg, Russland og ES um fyrisiting av fiskiskapinum í 1997.

Avtalan frá 28. oktober 1997 ásetir fyriskipanir um fiskiskapin eftir norðurhavssild í 1998. Avtalan tryggjar, at fiskiskapurin í 1998 verður á leið á hædd við kvotuna, sum ICES hevur mælt til ikki skal fara upp.

Henda avtala verður mett at vera góð fyri stovnin, tí hon m.a. tryggjar, at fiskiskapurin fer fram undir eftirliti og skynsamari stovnsrøkt.

Avtalan ásetir ikki endaligа býtið av rættindunum til norðurhavssildina millum strandalondini, men partarnir eru samdir um framhaldandi at kanna ferðingarmynstrið hjá sildini, og at nyta ferðingarmynstrið sum ein part í ásetingini av býtinum millum londini. SÍ-avtalan um ferðandi fiskastovnar verður eisini nýtt sum grundarlag fyri umsitingini av stovninum.

Strandalondini hava øll avtalað, hvussu nógv tey vilja loyva hvørjum øðrum at veiða í sínum egna sjógvi.

Partarnir samdust um at seta ein arbeiðsbólk, sum skal meta um hóskandi gagnnytslu av norðurhavssildastovninum komandi árini og í langtíðarhopi. Frágreiðingin skal verða liðug í seinasta lagi 1. oktober 1998, so hon er tøk til samráðingarnar um fiskiskapin í 1999.

Avtalan frá 28. oktober 1997 er hjáløgd.

Óalmenn umseting
Fundarsemja
um samráðingarnar um stýring av norska várgytandi sildastovninum (atlanto-skandiskn sildini) í laudnyrðingspartinum av Atlantshavinum í 1997

1. Ein sendinevnd úr Europeiska Samveldinum við Ole Tougaard á odda, ein sendinevnd úr Føroyum við Kaj P. Mortensen á odda, ein sendinevnd úr Íslandi við Jóhann Sigurjónsson á odda, ein sendinevnd úr Noregi við Dag Erling Stai á odda og ein sendinevnd úr Russlandi við Vladimir V. Sokolov á odda hittust í Oslo 28. oktober 1997 at samráðast um stýring av norska várgytandi sildastovninum (atlanto-skandisku sildini) í 1998.
2. Sendinevndarleiðararnir samdust um at mæla myndugleikunum í teirra londum til at seta í verk tá skipan fyri stýring av norska várgytandi sildastovninum (atlanto-skandisku sildini) í 1998, sum er ásett í skjalinum til hesa fundarsemju.
3. Henda fundarsemja, saman við teimum sínámillum avtalum, ið verða gjørdar innan fyri hesa fundarsemju, skal galda fyribils frá 1. januar 1998 og koma í gildi, tá partarnir hava fráboðað hvørjum øðrum, at tær neyðugu mannagongdirnar eru lidnar.

Skrivað í Oslo 28. oktober 1997 í 5 eintøkum á enskum. Partarnir skulu semjast um almennar umsetingar av hesi fundarsemju á enskum, føroyskum, íslendskum, norskum og russiskum.

Undirskriftir
Europeiska Samveldið, Føroyar, Ísland, Noreg og Russland

Skjal
1. Partarnir samdust um sum grundarlag at áseta MLV (mest loyvdu veiðuna) fyri norska várgytandi sildastovnin (atlanto-skandiska sildina), hereftir nevnt sild, til 1.302.000 tons í 1998.

2. Havandi hetta í huga samdust partarnir um at avmarka teirra veiði úr sildastovninum í 1998 til í mesta lagi 1.300.000 tons við hesum kvotum:

Europeiska Samveldið	109.000 tons*
Føroyar og Ísland	273.000 tons*
Noreg	741.000 tons
Russland	177.000 tons

3. Víðari avtalur, eisini avtalur um atgongd til veiðil á fiskiøkinum hjá pørtunum og aðrar treytir, verða ásettar í sínámillum avtalum.

4. Partarnir samdust um at seta ein arbeiðsbólk at kanna hóskandi gagnnytslu komandi árini og í langtíðarhøpi hesum stovni viðvíkjandi

Grundað á upplýsingar frá aprílfundi 1998 frágreiðingini frá ICES Arbeiðsbólkinum fyri Uppsjóvarfiskiskapi í Norðurhøvum og Svartkjaftafiskiskapinum og frágreiðingini frá ACFM í mai 1998 skal arbeiðsbólkurin meta um hóskandi aðferðir fyri gagnnytslu, fyriknað høvuðsendamálini at leggja grundarlag undir støðugan fiskiskap og endamálinum at forða fyri, at stovnurin minkar niður á eitt hættisligt støði.

Frágreiðingin frá arbeiðsbólkinum skal vera latin innan 1. oktober 1998 og skal vera partur av grundarlagnum undir avgerðum við tí endamáli at stíla fyri gagnnytsluni av hesum stovni komandi árini og í langtíðar høpi.

* Innan fyri sínámillum avtalurnar umbýta Føroyar og Evropeiska Samveldið 4.000 tons.

1. viðgerð háskeggin 19. februar 1998. Uppskotið verður beint í uttanlandsnevndina.

Málið fall bartur sbr. stýrisskipanarlógini § 15 stk. 3, tí at løgtingsvalið var 30. apríl 1998, og málið ikki var liðugt viðgjørt á tingi fyri valið.

F.L.j.nr. 1555-16/95

69 Uppskot til ríkislógartilmæli um at seta í gildi fyri Føroyar lóg um endurgjaldsábyrgd

Árið 1998, fríggjadagin 13. februar, legði Edmund Joensen, løgmaður, vegna Føroya landsstýri fram setjandi

Uppskot
til
ríkislógartilmæli um lóg um endurgjaldsábyrgd

Mælt verður ríkismyndugleikunum til at seta í gildi fyri Føroyar hjálagda uppskot til kongaliga fyriskipan um at seta í gildi fyri Føroyar lóg um endurgjaldsábyrgd.

Viðmerkingar
Høvuðsendamálið við lógini er at tryggja eitt endurgjald, sum í størri mun enn áður svarar virðið á peninga-

liga tapinum, tá onkur verður fyri persónskaða ella tap av uppihaldara. Orsøkin til tað er serliga, at vit í løtuni ikki hava eina lóggávu á hesum øki, og endurgjald tískil verður givið eftir rættarsiði, og svarar tað ikki til veruliga tapið.

Hækkanin innan privata endurgjaldsrættin kemur serliga teimum, ið eru komin ringast fyri tilgóðar, soleiðis at javnvág verður millum privata endurgjaldsrættin og vanlukku-tryggingarlógina.

Uppskotið hevur eisini reglur um ábyrgd skaðaelvarans, tá trygging bøtir aftur vanlukkutilburð. Eisini eru tað reglur um endurgjaldsábyrgdarlætta, tá endurgjaldsábyrgdin er serliga tyngjandi, og í serligum føri kann sígggjast burt frá medvirkni skadda til skaðan. Eisini er regla um at lætta ábyrgd arbeiðstakararans. At enda hevur uppskotið eisini reglur um sínámillum ábyrgd, tá talan er um samábyrgd.

Hækkar endurgjaldið, ber tað í sær eina eykaútreiðslu fyri landskassan, tá landið er endurgjaldsskyldugt, og onki aftursóknarkrav er møtvegis skaðaelvara. Tó kann sparast á sosiala økinum, av tí at hægri endurgjald til skadda fer at hava við sær, at tørvurin á sosialari veiting ikki er so stórur.

Tær einstøku broytingarnar og viðmerkingar til hesar:
Í uppskotinum verður ásett, hvussu upphæddirnar verða dagførdar (§ 15), og eru dagførdu upphæddirnar settar inn í uppskotið, sum tær eru ásettar við kunngerð nr. 1062 frá 18. desember 1997.

Í donsku lógini eru gjørdar niðanfyri standandi broytingar vegna serlig føroysk viðurskifti. Har ongar broytingar eru gjørdar verður víst til donsku lógarviðmerkingarnar í viðløgdu skjølum (skjølini er burturúrløgd, víst verður til folketingstidende 1983, tillæg A, sp. 47 ff).

Broytingar

1. § 2. stk. 2 verður orðað soleiðis: "Stk. 2. I erstatningen fradrages løn under sygdom, dagpenge fra arbejdsgiver, forsikringsselskab, Lønreguleringsfonden eller det offentlige, og forsikringsydelser, der har karakter af en virkelig skadeserstatning, samt lignende ydelser til den skadelidte."
2. Í § 10 verða orðini í yvirskriftini "Forelæggelse for Arbejdsskadestyrelsen" broytt til: "Forelæggelse for Færøernes Ulykkesforsikringsråd" og orðini "Arbejdsskadestyrelsen, jfr. lov om arbejdsskadeforsikring" broytt til: "Færøernes Ulykkesforsikringsråd, jfr. lagtingslov om ulykkesforsikring".
3. Í § 11 verður orðið "Arbejdsskadestyrelsen" broytt til: "Færøernes Ulykkesforsikringsråd".
4. Í § 16 verður eftir orðini "efter forhandling med" sett inn í millum "Færøernes hjemmestyre.".
5. Í § 17 verða orðini "lov om arbejdsskadeforsikring" broytt til: "lagtingslov om ulykkesforsikring", og orðið "land" sett inn millum "Stat, kommune". Eisini verður § 17, stk. 1 síðsta pkt. strikað.
6. Í § 20 verða strikað orðini "en kommune".
7. § 28 verður orðað soleiðis: "Anordningen træder i kraft den ..... og finder anvendelse på erstatningsansvur for skader, der indtræder efter anordningens ikrafttræden."
8. Í § 29, nr. 4 verðu orðini "§ 53, stk. 3, 2. pkt. i sømandsloven, jf. lov nr. 420 af 13. juni 1973" strikað og í staðin verður sett: "§ 63 og § 64 i lov nr. 277 af 30. juni 1992 om umyndighed og værgemål, somsenest ændret ved anordning nr. 14 af 18. januar 1982".
9. § 30 verður strikað.
10. § 32 verður strikað.

Viðmerkingar:

1. Til § 2, stk. 2: Neyðugt er við hesi broyting, tí føroyska lógaruppskotið um vanlukkutryggingarlóg varðveitir verandi dagpengaskipan, meðan danir hava eina øðrvísi skipan.
2. Til § 10: "Færøernes Ulykkesforsikringsråd" svarar til "Arbejdsskadestyrelsen" í donsku lógini, sbr. lógtingslóg nr. 389 frá 15. november 1966 við seinni broytingum um vanlukkutrygging.
3. Til § 11: Viðmerkingarnar eru tær somu sum til § 10.
4. Rentusatsurin sum innførdur er í Danmark við kunngerð nr. 896 frá 21. desember 1990, er settur inn í

uppskotið. Heimild løgmálaráðharrans er í uppskotinum broytt soleiðis, at hann fyrst skal tingast við landsstýrið, áðrenn hann broytir satsin fyri Føroyar.

5. Til § 17: "Lov om arbejdsskadeforsikring" svarar til løgtingslóg um vanlukkutrygging, og er tað tískil broytt. Eisini er tað landskassin, sum veitir pensjón o.a., og er orðingin "landet" tískil neyðug. Síðsta pkt. verður strikað, tí aftursóknarmøguleikin (regres) vegna dagpengar er ikki tikin við, tí sambr. dagpengalógini galdandi í Føroyum § 29, kann dagpeningaskipanin ikki gera aftursókn hjá skaðavaldaranum.
6. Til § 20: Broytingin er neyðug, tí at hvørki landið ella føroysku kommununar eru sjálvtryggaði mótsett danska statinum og donsku kommununum.
7. Til § 28: Ásetingarnar í hesi lóg verða nýttar á skaða ið hendir, eftir at lógin er komin í gildi. Ikki er nevnt hvør dato gildiskoman skal vera. Hetta má lógarmálaráðharrin gera av. Orsakað av innihaldinum í § 10 og § 11 í lógaruppskotinum, er tað ein fyritreyt, at hetta ikki kann hendn fyrr enn, ella sama dag sum løgtingslóg um vanlukkutrygging fær gildi.
8. Til § 29, nr. 4: Ásetingin í § 53, stk. 3, 2. pkt. er ikki í løgtingslóg um sjómenn, og er tí ikki við, meðan avtøka av § 63 og § 64 í lógini um ómyndug er sett inn. Í mun til í Danmark er neyðugt at avtaka § 63 og § 64 í lógini um ómyndug, sum enn hevur gildi í Føroyum, tí annars koma reglurnar at standa í tveimum støðum, bæði í endurgjaldslógini og lógini um ómyndug.
9. Til § 30: Danska vanlukkutryggingarlógin hevur ikki gildi fyri Føroyar, men verður nýggj løgtingslóg um vanlukkutrygging væntandi løgd fyri løgtingið skjótt.
10. Til § 32: Greinin gevur heimild til at seta lógina í gildi fyri Føroyar, og skal tískil ikki standa her.

Anordning om ikrafttræden for Færøerne af lov om erstatningsansvar.

I henhold til § 32 i lov nr. 228 af 23. maj 1984, jf. lovbekendtgørelse nr. 599 af 8. september 1986, som ændret ved lov nr. 196 af 29. marts 1989, lov nr. 389 af 7. juni 1989, lov nr. 73 af 1. februar 1995, lov nr. 389 af 14. juni 1995, lov nr. 1110 af 20. december 1995 og lov nr. 349 af 23. maj 1997 fastsættes, at loven sættes i kraft for Færøerne i følgende affattelse:

Kap. 1. Erstatning og godtgørelse for personskade og tab af forsørger

Personskade

§ 1. Den, der er erstatningsansvarlig for personskade, skal betale erstatning for tabt arbejdsfortjeneste, helbredelsesudgifter og andet tab som følge af skaden, samt en godtgørelse for svie og smerte.

Stk. 2. Har skaden fået varige følger, skal der tillige betales godtgørelse for varigt men samt erstatning for tab eller forringelse af erhvervsevne.

Stk. 3. Værdien af arbejde i hjemmet ligestilles med erhvervsindkomst.

Tabt arbejdsfortjeneste

§ 2. Erstatning for tabt arbejdsfortjeneste fastsættes for tiden fra skadens indtræden, indtil skadelidte kan begynde at arbejde igen eller skadelidtes helbredstilstand er blevet stationær.

Stk. 2. I erstatningen fradrages løn under sygdom, dagpenge fra arbejdsgiver, forsikringsselskab, Lønreguleringsfonden eller det offentlige og forsikringsydelser, der har karakter af en virkelig skadeserstatning, samt lignende ydelser til den skadelidte.

Svie og smerte

§ 3. Godtgørelse for svie og smerte udgør for tiden fra skadens indtræden, indtil skadelidtes helbredstilstand er blevet stationær, 160 kr for hver dag, den skadelidte er sengeliggende, og 70 kr for hver dag, den skadelidte er syg uden at være sengeliggende. Der kan i særlige tilfælde ydes godtgørelse for svie og smerte, selv om skadelidte ikke er syg. Overstiger godtgørelsen 23.500 kr. kan de beløb, der er nævnt i 1. pkt, fraviges.

Varigt men

§ 4. Godtgørelse for varigt men fastsættes til et kapitalbeløb, der beregnes under hensyn til skadens medicinske art og omfang og de forvoldte ulemper i skadelidtes personlige livsførelse. Méngraden fastsættes efter forholdene på det tidspunkt, da skadelidtes helbredstilstand blev stationær. Godtgørelsen udgør ved en méngrad på 100% 312.000 kr. Ved lavere méngrader nedsættes beløbet forholdsmæssigt. I særlige tilfælde kan méngodtgørelsen fastsættes til et højere beløb, dog højst 374.500 kr. Ved en méngrad på under 5% ydes ingen godtgørelse.

Stk. 2. Var skadelidte ved skadens indtræden fyldt 60 år, nedsættes den i henhold til stk. 1 beregnede godt-

gørelse for men med 5% for hvert år, skadelidte var ældre end 59 år ved skadens indtræden. Godtgørelsen nedsættes dog ikke yderligere efter det fyldte 69. år.

Erhvervsevnetab

§ 5. Har en personskade, efter at skadelidtes helbredstilstand er blevet stationær, medført varig nedsættelse af skadelidtes evne til at skaffe sig indtægt ved arbejde, tilkommer der skadelidte erstatning for tab af erhvervsevne.

Stk. 2. Ved bedømmelsen af erhvervsevnetabet skal der tages hensyn til skadelidtes muligheder for at skaffe sig indtægt ved sådant arbejde, som med rimelighed kan forlanges af skadelidte.

Stk. 3. Skadelidtes erhvervsevnetab beregnes i procent (erhvervsevnetabsprocenten). Der ydes ikke erstatning, såfremt erhvervsevnetabet er mindre end 15%.

§ 6. Erstatningen fastsættes til et kapitalbeløb, der udgør skadelidtes årsløn, jf § 7, ganget med 6 og herefter ganget med erhvervsevnetabsprocenten, jf § 5, stk 3.

§ 7. Som årsløn regnes skadelidtes samlede erhvervsindtægt i det år, der går forud for datoen for skadens indtræden.

Stk. 2. Årslønnen fastsættes dog efter et skøn, når særlige indtægts- eller ansættelsesforhold eller andre særlige forhold har gjort sig gældende.

Stk. 3. Årslønnen kan højst udgøre 546.000 kr.

§ 8. For en skadelidt, der i det væsentlige udnytter erhvervsevnen på en måde, som ikke eller kun i begrænset omfang medfører erhvervsindtægt, og for børn fastsættes erstatningen som et kapitalbeløb på grundlag af den i § 4 nævnte méngrad. Erstatningen fastsættes som eh procentdel af den i § 4, stk 1, 1.-4. pkt, nævnte méngodtgørelse.

Stk. 2. Ved en méngrad på under 15% ydes ingen erstatning. Ved méngrader på 15%, 18% og 20% udgør erstatningen henholdsvis 130%, 135% og 140% af méngodtgørelsen.

Stk. 3. Ved en méngrad på 25% udgør erstatningen 150% af méngodtgørelsen. Ved méngrader på 30%, 35%, 40%, 45% og 50% udgør erstatningen henholdsvis 160%, 170%, 180%, 190% og 200% af méngodtgørelsen.

Stk. 4. Ved en méngrad på 55% udgør erstatningen 225% af méngodtgørelsen. Ved méngrader på 60%, 65%, 70%, 75%, 80% og 85% udgør erstatningen henholdsvis 250%, 275%, 300%, 325%, 350% og 375% af méngodtgørelsen. Ved méngrader på 90%, 95% og 100% udgør erstatningen 400% af méngodtgørelsen.

§ 9. Var skadelidte ved skadens indtræden fyldt 56 år, nedsættes erstatningen med 8 1/2% for hvert år, skadelidte var ældre end 55 år ved skadens indtræden.

Stk. 2. Må det antages, at skadelidte ville have været erhvervsaktiv også efter det fyldte 67. år, kan stk 1 fraviges helt eller delvis.

Forelæggelse for Færøernes Ulykkesforsikringsråd

§ 10. Såvel skadelidte som skadevolderen kan indhente en udtalelse om spørgsmålet om fastsættelsen af méngraden og erhvervsevnetabsprocenten fra Færøernes Ulykkesforsikringsråd, jfr. lagtingslov om ulykkesforsikring.

Genoptagelse

§ 11. En afsluttet sag om godtgørelse for varigt men eller erstatning for erhvervsevnetab kan på skadelidtes begæring genoptages, hvis der indtræder uforudsete ændringer i skadelidtes helbredstilstand, således at skadelidtes méngrad eller erhvervsevnetabsprocent må antages at være væsentligt højere end først antaget. Ved genoptagelse af sagen kan spørgsmålet om fastsættelsen af méngraden og erhvervsevnetabsprocenten igen begæres forelagt for Færøernes Ulykkesforsikringsråd, jf § 10.

Tab af forsørger m.v.

§ 12. Den, som er erstatningsansvarlig for en andens død, skal betale erstatning for rimelige begravelsesudgifterog erstatning til den, som ved dødsfaldet har mistet en forsørger. Forsørgelse omfatter også værdien af afdødes arbejde i hjemmet.

Erstatning til ægtefælle eller samlever

§ 13. Erstatning for tab af forsørger til ægtefælle eller samlever udgør 30% af den erstatning, som afdøde må antages at ville have opnået ved et fuldstændigt tab af erhvervsevnen, jf §§ 5-8. Erstatningen udgør dog mindst 351.000 kr, medmindre der foreligger særlige omstændigheder.

Stk. 2. Var forsørgeren fyldt 56 år, nedsættes erstatningen efter reglerne i § 9.

Forsørgertabserstatning til børn

§ 14. Erstatning for tab af forsørger til efterlevende børn fastsættes til et beløb, der svarer til summen af de bidrag til barnets underhold, som afdøde på skadestidspunktet kunne være pålagt efter lov om børns retsstilling, hvis afdøde havde været bidragspligtig. Var afdøde eneforsørger, forhøjes erstatningen med 100%.

Regulering af erstatnings- og godtgørelsesbeløb

§ 15. De i § 3, § 4, stk 1, § 7, stk 3, og § 13, stk 1, 2. pkt, nævnte beløb reguleres årligt pr 1. januar med 2,0% tillagt tilpasningsprocenten for det pågældende finansår, jf lov om satsreguleringsprocent. De herefter fremkomne beløb afrundes til nærmeste med 500 delelige kronebeløb, for de i § 3, 1. pkt, nævnte beløb dog til nærmeste med 10 delelige kronebeløb.

Stk. 2. Justitsministeren bekendtgør hvert år, hvilke reguleringer der skal finde sted.

Stk. 3. Erstatning og godtgørelse fastsættes på grundlag af de beløb, der i henhold til stk. 1 var gældende på tidspunktet for skadens indtræden.

Forrentning

§ 16. Krav om godtgørelse for svie og smerte, godtgørelse for varigt men, erstatning for erhvervsevnetab samt erstatning for tab af forsørger forrentes fra skadestidspunktet, til betaling sker, med en årlig rente, der svarer til den til enhver tid fastsatte officielle diskonto med et tillæg på 5%. Justitsministeren kan hvert andet år efter forhandling med Færøernes hjemmestyre, Danmarks Nationalbank og økonomiministeriet ændre renten.

Regres mod den erstatningsansvarlige

§ 17. Ydelser i henhold til den sociale lovgivning, herunder dagpenge, sygehjælp, pension efter den sociale pensionslovgivning og ydelser i henhold til lagtingslov om ulykkesforsikring, som tilkommer en skadelidt eller efterlevende, kan ikke danne grundlag for regreskrav mod den erstatningsansvarlige. Det samme gælder pensionsydelser, der udbetales af stat, land, kommune eller i henhold til anden pensionsordning, samt forsikringsydelser uanset forsikringens karakter, jf § 22, stk 2.

Stk. 2. En arbejdsgiver, der har udbetalt dagpenge eller sygeløn til en skadelidt eller har udbetalt dertil knyttede ydelser, kan gøre regres mod den erstatningsansvarlige i det omfang, arbejdsgiveren har lidt et tab.

Overførelse mv af erstatnings- og godtgørelseskrav

§ 18. Krav om erstatning og godtgørelse for personskade og krav om erstatning til den, der har mistet en forsørger, kan ikke overdrages, så længe kravet og dets størrelse ikke er anerkendt eller fastslået af domstolene.

Stk. 2. Krav om godtgørelse for personskade falder i arv, når det er anerkendt eller gjort gældende ved sagsanlæg eller under en straffesag ved kravets fremsættelse i retten eller i et anklageskrift eller en stævning, der er indleveret til retten.

Stk. 3. Erstatning og godtgørelse som nævnt i stk 1, der ikke må antages at være forbrugt, indgår ikke i formuefællesskabet mellem ægtefæller ved skifte i anledning af ægteskabs ophør, separation eller bosondring. Erstatningen eller godtgørelsen indgår dog i formuefællesskabet, når den, som erstatningen tilkommer, afgår ved døden, medmindre erstatningen eller godtgørelsen ifølge ægtepagt er særeje.

Stk. 4. Reglerne i stk 1 og stk 3 finder ikke anvendelse på krav om erstatning for tabt arbejdsfortjeneste.

Kap 2. Erstatningsansvar for skade, der er dækket af forsikring

19. I det omfang en skade er dækket af en tingsforsikring eller en driftstabsforsikring, er der ikke erstatningsansvar.

Stk. 2. Reglen i stk 1 gælder ikke, såfremt:

1) den erstatningsansvarlige har forvoldt skaden forsætligt eller ved grov uagtsomhed, eller
2) skaden er forvoldt ved udøvelse af offentlig eller erhvervsmæssig virksomhed eller virksomhed, der kan ligestilles hermed.

Stk. 3. Har en arbejdstager forvoldt en skade, der er dækket af en tingsforsikring, en driftstabsforsikring eller arbejdsgiverens ansvarsforsikring, ifalder arbejdstageren ikke erstatningsansvar, medmindre skaden er forvoldt forsætligt eller ved grov uagtsomhed.

§ 20. Staten eller en anden offentlig institution, der i almindelighed er selvforsikrer, er stillet, som om forsikring var tegnet, jf § 19.

§ 21. §§ 19 og 20 gælder ikke for erstatningsansvar, der er omhandlet i

1) færdselslovens regler om ansvar for motordrevne køretøjer, eller som i øvrigt er dækket af den for køretøjet lovpligtige ansvarsforsikring,

2) luftfartsloven eller
3) søloven.

§ 22. Såfremt der er erstatningsansvar for en skade, der er dækket af en skadesforsikring, indtræder forsikringsselskabet i det omfang, det har betalt erstatning, i den skadelidtes ret mod den erstatningsansvarlige.
Stk. 2. Ved livs-, ulykkes- eller sygeforsikring eller anden personforsikring har selskabet uanset forsikringens karakter intet krav mod den erstatningsansvarlige.

Kap 3. Forskellige bestemmelser

Arbejdstagers erstatningsansvar

§ 23. Erstatning, som en arbejdsgiver har måttet udrede som følge af en arbejdstagers uforsvarlige adfærd, kan kun kræves betalt af denne i det omfang, det findes rimeligt under hensyn til den udviste skyld, arbejdstagerens stilling og omstændighederne i øvrigt.
Stk. 2. Arbejdstagerens erstatningsansvar over for skadelidte kan nedsættes eller bortfalde, hvis det findes rimeligt under hensyn til de i stk. 1 nævnte omstændigheder og til skadelidtes interesse. Erstatning, som arbejdstageren har måttet udrede, kan denne kræve betalt af arbejdsgiveren i det omfang, ansvaret endeligt skal påhvile arbejdsgiveren efter stk. 1.
Stk. 3. Bestemmelsen i stk. 1 finder tilsvarende anvendelse på arbejdsgiverens erstatningskrav mod arbejdstageren for skade, denne i øvrigt forvolder arbejdsgiveren i tjenesten.

Almindelig lempelsesregel

§ 24. Erstatningsansvar kan nedsættes eller bortfalde, når ansvaret vil virke urimeligt tyngende for den erstatningsansvarlige, eller når ganske særlige omstændigheder i øvrigt gør det rimeligt. Ved afgørelsen skal der tages hensyn til skadens størrelse, ansvarets beskaffenhed, skadevolderens forhold, skadelidtes interesse, foreliggende forsikringer samt omstændighederne i øvrigt.
Stk. 2. Under tilsvarende betingelser som angivet i stk. 1 kan der ses helt eller delvis bort fra skadelidtes medvirken til skaden. Ved krav om erstatning til den, der har mistet en forsørger, gælder det samme om afdødes medvirken.

Børns erstatningsansvar m.v.

§ 24a. Barn under 15 år er erstatningspligtigt for skadegørende handlinger efter samme regler som personer over denne alder. Dog kan erstatningen nedsættes eller endog helt bortfalde, for så vidt det findes billigt på grund af manglende udvikling hos barnet, handlingens beskaffenhed og omstændighederne i øvrigt, derunder navnlig forholdet mellem den skadegørendes og den skadelidendes evne til at bære tabetog udsigten til, at skaden kan fås godtgjort hos andre.

§ 24b. En person, som på grund af sindssygdom, hæmmet psykisk udvikling, forbigående sindsforvirring eller lignende tilstand har manglet evnen til at handle fornuftmæssigt, er erstatningspligtig for skadegørende handlingerefter samme reglersom sjælssunde personer. Dog kan erstatningen nedsættes eller endog helt bortfalde, for så vidt det findes billigt under hensyn til personens sindstilstand, handlingens beskaffenhed eller omstændighederne i øvrigt, derunder navnlig forholdet mellem den skadegørendes og den skadelidendes evne til at bære tabet og udsigten til, at skaden kan fås godtgjort hos andre.
Stk. 2. Har den skadegørende ved misbrug af berusselsesmidler eller på lignende måde forbigående hensat sig i en sindstilstand som ovenfor nævnt, er en lempelse i erstatningsansvaret udelukket.

Flere erstatningsansvarlige

§ 25. Den indbyrdes fordeling af erstatningsbyrden mellem flere solidarisk erstatningsansvarlige foretages efter, hvad der under hensyn til ansvarets beskaffenhed og omstændighederne i øvrigt må anses for rimeligt.
Stk. 2. Er en eller flere af de erstatningsansvarlige dækket af en ansvarsforsikring gælder § 19, stk. 1 og 2, og § 21. I de tilfælde, der er nævnt i § 19, stk. 2, nr. 1 og 2, og § 21, kan der ved den indbyrdes fordeling af erstatningsbyrden mellem skadevolderne tages hensyn til foreliggende ansvarsforsikringer. § 20 finder tilsvarende anvendelse.

Godtgørelse for tort

§ 26. Den, der er ansvarlig for en retsstridig krænkelse af en andens frihed, fred, ære eller person, skal betale den forurettede godtgørelse for tort.
Stk. 2. Selv om der ikke er lidt tort, skal den, der er ansvarlig for en retsstridig krænkelse af en anden, dog betale den forurettede en godtgørelse, såfremt krænkelsen er begået ved en forbrydelse, der har indeholdt et særlig groft angreb mod en andens person eller frihed.

Stk. 3. § 18, stk 1 og 2, finder tilsvarende anvendelse på godtgørelse efter stk 1 og 2.

Fravigelse af lovens regler

§ 27. Aftaler om fravigelse af reglerne i §§ 1-16, § 24, stk 2, og § 26, der er indgået inden en skades indtræden, er ugyldige, såfremt fravigelsen er til ugunst for den erstatningsberettigede.

Stk. 2. Aftaler om fravigelse af § 17, stk 1, § 19, stk 1 og 3, § 20, § 22, stk 2, § 23, § 24, stk 1, og § 25, der er indgået inden en skades indtræden, er ugyldige, såfremt fravigelsen er til ugunst for den erstatningsansvarlige. Reglen i § 25 kan dog fraviges for skader, der forvoldes ved udøvelse af offentlig eller erhvervsmæssig virksomhed eller virksomhed, der kan ligestilles hermed.

Kap 4. Ikrafttrædelsesbestemmelser m.v.

§ 28. Anordningen træder i kraft den ..... og finder anvendelse på erstatningsansvar for skader, der indtræder efter anordningens ikrafttræden.

§ 29. Følgende lovbestemmelser ophæves:

1) § 25 i lov nr 129 af 15. april 1930 om forsikringsaftaler.
2) § 15 i lov om ikrafttræden af borgerlig straffelov m m, jf lovbekendtgørelse nr 277 af 30. juni 1965.
3) § 14, stk 3, 2. pkt, i arveloven, jf lov nr. 215 af 31. maj 1963.
4) § 63 og § 64 i lov nr. 277 af 30. juni 1922 om umyndighed og værgemål, som senest ændret ved anordning nr. 14 af 18. januar 1982.
5) § 67, 2. pkt, i søloven, jf. lovbekendtgørelse nr 353 af 1. juli 1974.

§ 30. Udgår.

§ 31. En forsikringstager kan ikke opsige en forsikringsaftale på grund af en forhøjelse af præmien, som alene er begrundet med den ændring af størrelsen af erstatning for personskade og tab af forsørger, der er en følge af denne lov.

§ 32. Udgår.

Lýst í løgtingssalinum hósdagin 19. februar 1998. Uppskotið verður heimvíst í ræðuna.

Málið fall burtur sbr. stýrisskipanarlógini § 15 stk. 3, tí at løgtingsval var 30. apríl 1998, og málið ikki var liðugt viðgjørt á tingi fyri valið.

F.L.j.nr. 615-1/91

70 Uppskot til løgtingslóg um sosialar pensiónir o.a.

Ár 1998, fríggjadagin 13. februar, legði Kristian Magnussen, landsstýrismaður, vegna Føroya landsstýri fram soljóðandi

Uppskot
til
løgtingslóg um sosialar pensiónir o.a.

Kapittul 1
Heimild

§ 1. Henda lóg um sosialar pensiónir er givin út sambært § 1, stk. 2, nr. 2 í ríkislóg nr. 315 frá 17. mai 1995 "om sociale ydelser på Færøerne".

Kapittul 2
Veitingar

§ 2. Pensiónir eftir hesi lóg eru:

1) fólkapensión, sum er sett saman av grundupphædd og pensiónsviðbót,
2) hægsta fyrtíðarpensión, sum er sett saman av grundupphædd, pensiónsviðbót, fyrtíðarviðbót og óarbeiðsførisviðbót,
3) miðal fyrtíðarpensión, sum er sett saman av grundupphædd, pensións viðbót og fyrtíðarviðbót,
4) lægsta fyrtíðarpensión, sum er sett saman av grundupphædd og pensiónsviðbót,
5) avlamisveiting, og

6) veitingar eftir kap. 11

Stk. 2. Til pensiónir, kunna eftir reglunum í kapittul 4, verða veittar hesar viðbøtur:

1) barnaviðbót
2) hjálparviðbót,
3) røktarviðbót, og
4) persónlig viðbót.

Kapittul 3
Treytir
Heimarættur, bústaður, a.a.

§ 3. Rætturin til pensión er treytaður av,

1) at tann, ið fær pensión, hevur danskan heimarætt ella er giftur við ella seinast hevur verið giftur við einum persóni við donskum heimarætti,
2) at tann, ið fær pensión, hevur fastan bústað í Føroyum ella hevur hyru við skipi skrásett í Føroyum, og
3) at tann, ið fær pensión, hevur havt fastan bústað í danska ríkinum í minsta lagi 3 ár frá fylta 15. árinum til fylta 67. árið.

Stk. 2. Samsvarandi reglum í sáttmálum við onnur lond, kann landsstýrismaðurin áseta reglur um undantak frá treytunum í stk. 1. nr. 1 og 2.

Stk. 3. Tá heilt serligar umstøður tala fyri tí, kann landsstýrismaðurin gera undantøk frá reglunni í stk. 1. nr. 1 fyri persónar, sum hava havt fastan bústað í Føroyum í minsta lagi 10 ár millum fylta 15. árið og fylta 67. árið, herav minst 5 ár beint áðrenn pensión verður tillutað. Somuleiðis kann

landsstýrismaðurin gera undantøk frá reglunni í stk. 1, nr. 2 fyri persónar, sum aftaná at hava fingið pensión, búsetast í útlandinum.

Treytir fyri tillutan av tí einstøku veitingini

§ 4. Rætt til fólkupensión hava persónar, sum hava fylt 67 ár.

§ 5. Fyritíðarpensión kann ikki tillutast persónum undir 60 ár, um so er, at møguleikar eru fyri útvegan av hóskandi arbeiði ella at seta í verk fyriskipanir, sum betra arbeiðsførleikan.

§ 6. Hægsta fyritíðarpensión kann tillutast persónum, sum hava fylt 18 ár, men sum ikki hava fylt 60 ár, tá umsóknin verður latin inn, ið, orsakað av líkamligum ella sálarligum avlatnni, mugu roknast sum varandi óarbeiðsførir í eini og hvørjari vinnu, ella sum eintans hava smávegis eftir av arbeiðsføri.

§ 7. Miðal fyritíðarpensión kann tillutast

1) persónum, sum hava fylt 18 ár, men sum ikki hava fylt 60 ár, tá umsóknin verður latin inn, hvørs arbeiðsføri, orsakað av líkamligum ella sálarligum avlatnni, varandi er minkað við í minsta lagi 2/3,
2) persónum yvir 60 ár, hvørs arbeiðsføri er minkað sum ásett í § 6, og
3) einkjum og einkjumonnum við uppihaldsskyldu mótvegis børnum undir 18 ár.

Stk. 2. Fyritíðarviðbót eftir stk. 1, nr. 3 verður veitt við hálvu upphæddini eitt ár aftaná at rætturin til hesa pensión er mistur, tí viðkomandi ikki longur hevur børn undir 18 ár.

§ 8. Lægsta fyritíðarpensión kann tillutast

1) persónum millum 18 og 67 ár, hvørs arbeiðsføri, orsakað av líkamligum ella sálarligum avlatnni, varandi er minkað við í minsta lagi eitt helvt,
2) persónum millum 50 og 67 ár og persónum sum hava móttikið pensión eftir § 7, stk. 1, nr. 3, men sum hava mist rættin til hesa pensión tí yngsta barnið hevur fylt 18 ár, tá viknandi heilsa, vantandi arbeiðsmøguleikar ella aðrar serligar umstøður tala fyri tí, og mett verður, at viðkomandi hevur ein varandi forsorganarørv.

§ 9. Í metingini av í hvønn mun arbeiðsførið er minkað eftir § 6, § 7, stk. 1, nr. 1 og 2 og § 8, nr. 1 skal metast um

1) tá inntøku, sum viðkomandi verður mettur at kunna forvinna við einum arbeiði, sum svarar til hansara kreftir og førleikar, og sum við atliti til útbúgving og virksemi fyrr, kann verða kravt av honum, samanborið við tá inntøku, sum persónar við samsvarandi útbúgving vanliga kunnu forvinna í sama øki,
2) aldur, lívsstarv, bústað og arbeiðsmøguleikar, umframt líkindi fyri betran ella versnan av avlatnnum,
3) slíkar aðrar umstøður, sum hildið verður í tí einstaka førinum, at dentur skal leggjast á í heildarmetingini av skerda arbeiðsførinum.

§ 10. Avlatnisveiting kann tillutast persónum millum 18 og 67 ár, sum vegna arbeiðsinntøku ikki kunnu fáa pensión eftir dømingini samsvart § 9, men har avlatnni læknaliga mett er so mikið umfatandi, at teir vildu havt rætt til hægstu ella miðal fyritíðarpensión, um teir ikki hevdu arbeiði.

Kapittul 4
Viðbøtur

§ 11. Barnaviðbót verður veitt einum pensionisti, sum hevur upphalds- ella gjaldsskyldu mótvegis einum barni undir 18 ár.

Stk. 2. Hava fleiri pensionistar uppihalds- ella gjaldsskyldu mótvegis sama barni, verður barnaviðbót útgoldin til tann, sum er úfagdur at rinda gjald til barnið, ella um gjald ikki er ásett, til tann sum einsamallur ella í størstan mun uppiheldur ella bevur uppihildið barnintu.

Stk. 3. Barnaviðbót verður útgoldin við somu upphædd fyri hvørt barnið sum vanliga gjaldið eftir lóg um barnagjald til einsamallar uppihaldarar v. fl.

Stk. 4. Barnaviðbót verður ikki veitt í førum, sum nevnd eru niðanfyri:

1) um pensionisturin byr saman við einum persóni, ið ikki er pensionistur, og hesin hevur uppihaldsskyldu mótvegis sama barni, ella um pensionisturin fær gjald til uppihald barnsins.
2) um pensionisturin fær gjald eftir 2. parti í lóg um barnagjald til einsamallar uppihaldarar v.fl. ella hevur rætt til eitt tílíkt gjald,
3) um barnið er uppihildið uttanfyri heimið eftir forsorgar- ella barnaforsorgar-løggávuni.

Stk. 5. Barnaviðbótin verður útgoldin eina ferð um mánaðin saman við pensiónini.

Stk. 6. Broyting av barnatali undir 18 ár hjá einum pensionisti fær gildi frá 1. í mánaðinum aftaná broytingina.

§ 12. Hjálparviðbót kann tillutast einum fyritíðarpensionisti, um viðkomandi støðugt má hava persónliga hjálp frá øðrum, ella um avlamnið stavar frá blindi ella nógv miðurseftari sjón.

Stk. 2. Røktarviðbót kann tillutast í staðin fyri hjálparviðbót um avlamnið hevur við sær tørv á varandi røkt ella støðugari umsjón, ið ger tað neyðugt, at annar persónur er støðugt hjáverandi.

Stk. 3. Hjálparviðbót og røktarviðbót verða ikki útgoldnar, um pensionisturin ið sama tíðarskeiðið fær stuðul samkvæmt lóg um samsyning fyri at ansa eldri og óhjálpnum heima. Útgjaldingin verður tikin upp aftur, tá ansingarstuðulin heldur uppat.

Stk. 4. Persónar, sum fáa avlamisveiting eftir § 10, hava eisini rætt til hjálpar- og røktarviðbót eftir reglunum í stk. 1-3.

§ 13. Persónlig viðbót kann verða veitt einum pensionisti, sum hevur serliga truplar kor.

Stk. 2. Avgerð kann takast um, at persónlig viðbót eftir stk. 1 viðvíkjandi útreiðslum til egnan bústað, skal gjaldast aftur. Afturgjaldskravið kann avskrivast, tá tað imanfyri eitt rímiligt áramál aftaná at kravið er sett fram, verður mett, at ongin fíggjarligur møguleiki er fyri at fremja kravið.

Stk. 3. Stuðul kann hartumframt veitast til umsorgararbeiði fyri pensionistar.

Stk. 4. Landsstýrismaðurin ásetir nærri reglur um

1) veiting av persónligari viðbót eftir stk. 1, herundir um møguligt egingjald,
2) afturgjalding eftir stk. 2, og
3) stuðul til umsorgararbeiði eftir stk. 3.

Kapittul 5
Útrokning

Innvinnan eftir bústaðartíð í danska ríkinum

§ 14. Rætturin til fulla pensión til persónar yvir 67 ár er treytaður av fastum bústaði í danska ríkinum í minsta lagi 40 ár.

Stk. 2. Er treytin fyri fullari pensión eftir stk. 1 ikki lokin, verður pensiónin ásett eftir lutfallinum millum bústaðartíðina og 40 ár.

Stk. 3. Tá ein pensionistur fer frá fyritíðar-pensión til fólkapensión við 67 ára aldur, verður pensiónin útgoldin við eins nógvum fjørutiundapartum, sum pensiónin hitgartil hevur verið útgoldin.

§ 15. Rætturin til fulla pensión til persónar undir 67 ár er treytaður av, at bústaðartíðin í danska ríkinum er í minsta lagi 4/5 av árunum frá tí fylta 15. árinum til dagfestingina fyri játtan av pensión.

Stk. 2. Er treytin fyri tillutan av fullari pensión eftir stk. 1 ikki lokin, verður pensiónin ásett eftir lutfallinum millum bústaðartíðina og 4/5 av tíðini frá tí fylta 15. árinum til dagfestingina fyri tillutan av pensión.

Stk. 3. Tann útroknaði parturin av fullari pensión verður lækkaður til næsta talið av fjørutiundapartum av fullari pensión.

§ 16. Við útrokning av pensión, ið verður veitt eftir § 14, stk. 2 og § 15, stk. 2, verður fulla pensiónin fyrst útroknað eftir reglunum í §§ 19-21. Síðani verður útroknaða pensiónsuppheddin lækkað við tí útroknaða talinum av fjørutiundapartum. Viðbøtur samkvæmt § 11 og § 13 verða tó ikki lækkaðar.

Uppgerð av bústaðartíðini

§ 17. Tá ið bústaðartíðin verður gjørd upp eftir áseglingunum í § 3, stk. 1, nr. 3 og §§ 14 og 15 verður við bústað í danska ríkinum javnsett

1) hýru við føroyskum, grønlendskum eller donskum skipi,
2) uppihald uttanlands sum útsendt umboð fyri ein føroyskan, grønlendskan ella danskan almennan myndugleika,
3) uppihald uttanlands annars í sambandt við starv í føroyskum, grønlendskum ella donskum almennum áhuga.
4) uppihald uttanlands í sambandi við starv á deild av eini føroyskari, grønlendskari ella danskari fyritøku ella dótturfelag hjá hesum fyritøkum, ella
5) uppihald uttanlands við atliti til útbúgving.

§ 18. Í uppgerðini av bústaðartíðini verður einans roknað við bústaðartíðum frá tí fylta 15. árinum, tó í mesta lagi til fylta 67. árið. Fleiri bústaðartíðarskeið verða samanløgd og samlaða bústaðartíðin verður lækkað til næsta heila talið av árum. Tó verða tær nevndu bústaðartíðirnar avrundaðar til næsta heila talið av mánaðum við útroknan av luttallinum eftir § 15, stk. 2.

Inntøkujavning

§ 19. Grunduppheedd til fólkapensión, úrbeiðsføriviðbót og fyritíðarviðbót til pensión eftir § 6 og § 7, stk. 1, nr. 1 og 2 verða útgoldnar uttan mun til tíggjarliga viðurskiftini hjá tí, ið fær pensión.
Stk. 2. Grunduppheedd til fyritíðarpensión, fyritíðarviðbót til pensión eftir § 7, stk. 1, nr. 3 og stk. 2 og pensiónsviðbót verða eftir reglunum í § 20 útroknaðar eftir inntøku.

§ 20. Grunduppheedd til fyritíðarpensión verður lækkað við 60% av inntøkugrundarlag pensionistsins eftir § 21.
Stk. 2. Fyritíðarviðbót eftir § 7, stk. 1, nr. 3 og stk. 2 verður lækkað við 60% í framhaldi av og eftir somu reglum sum lækkingin av grunduppheddini eftir stk. 1.
Stk. 3. Pensiónsviðbót verður lækkað við 30% av inntøkugrundarlagnum eftir § 21. Um báðir hjúnafelagnir fáa pensión, verður pensiónsviðbótin tó lækkað við 15% fyri hvønn hjúnarfelaga. Pensiónsviðbót til giftan pensionist verður, uttan mun til um tann eini ella báðir hjúnafelagarnir fáa pensión, lækkað við grundarlag í inntøkum hjá báðum hjúnafeløgunum tilsamans.
Stk. 4. Pensiónin dettur burtur, tá hon gerst minni enn ein minstauppheedd, smh. § 30, stk. 1, nr. 5.

Inntøkugrundarlag

§ 21. Inntøkugrundarlagið fyri útrokning av uppheddum samhært § 20 verður uppgjørt soleiðis:
1) Øll inntøka við frádrátti fyri egið gjald til eftirløn. Inntøkur av tíggjarogn verða einans roknaðar uppí inntøkugrundarlagið, um munurin millum rentuinntøkur o.a. og rentuútreiðslur er positivur. Hjúnafelagar standa fyri eini helvt í part av rentuinntøkunum hjá báðum tilsamans.
2) Árið fyri uppgerð av inntøkugrun-darlagnum er seinasta av skattaváldunum álíknaða inntøkuárið.
3) Møgulig inntøka av fyribils hjálp sambært forsorgarlógini fyri sama inntøkuár verður løgd aftur at inntøkuni eftir nr. 1. Forsorgarhjálp verður einans løgd aftur at, um viðkomandi heldur fram at fáa ta arbeiðsinntøku, sum forsorgarhjálpin kom í staðin fyri.
4) Um so er, at arbeiðsinntøkan varandi broytist í sambandi við pensiónstillutan, verður tann væntaða inntøkan nýtt í fyrstu pensiónsútrokningini í staðin fyri inntøkuna inntøkuárið sambært nr. 2. Tann soleiðis útroknaða pensiónin verður eftirroknað árliga til viðkomandi inntøka er á leið hin sama sum inntøkan sambært inntøkuárið sambært nr. 2.

Stk. 2. Uppí inntøkuna eftir stk. 1 skulu ikki roknast sosialar pensiónir, hetmillum sosial pensión útgoldin í einum landi, sum sáttmáli er gjørdur við um pensiún og sosialar veitingar við samsvarandi endamáli. Arbeiðsmarknaðareftirlon eftir lógtingslóg um arbeiðsmarknaðareftirlonargrunn verður heldur ikki roknað upp í inntøkuna.
Stk. 3. Aðrenn grunduppheedd og fyritíðarviðbót verða útroknaðar eftir inntøku, verður ein frádráttur gjørdur í inntøkugrundarlagnum.
Stk. 4. Fyri arbeiðsinntøkur verður ein eyka frádráttur gjørdur í inntøkugrundarlagnum.
Stk. 5. Aðrenn pensiónsviðbót verður útroknað eftir inntøku, verður ein frádráttur gjørdur í inntøkugrundarlagnum.
Stk. 6. Tann eftir stk. 1-5 uppgjørda inntøkan verður avrundað niðureftir til næstu upphædd, sum kann deilast við 100.

Kapittul 6
Árlig ásetan, broytingar, afturtøka, o.a.

§ 22. Pensiónin verður ásett eina ferð um árið eftir inntøkugrundarlagnum sambært § 21.
Stk. 2. Pensiónin verður umroknað í árinum,
1) um inntøkan broytist meira enn fyribils og ein útrokning av pensiónini, grundað á væntaða inntøkuna í framtíðini, hevur við sær, at pensiónsupphæddin broytist avgerandi, ella

2) um broytingar hendа í teimum persónligu viðurskiftunum, herfimillum hjúnabandsstøðu, uppihaldarastøðu ella øðrum viðurskiftum, sum hava týdning fyri støddina av pensiónini.

Stk. 3. Um ein broytt arbeiðsinntøka framyvir er óvíss at meta um, kann pensiónin verða ásett við stuttri millumbilum enn einaferð um árið við grundarlag í teirri inntøku, ið er skrásett hjá Toll- og Skattstovu Føroya.

Stk. 4. Fyritreytin fyri at broyta pensiónsútrokningina hjá einum pensionisti, ið hevur inntøku av sjálvstøðugum virki er, at viðkomandi hevur boðað Toll- og Skattstovu Føroya frá inntøkubroytingini.

Stk. 5. Pensión ásett samhært stk. 2-4, skal eftirroknast í sambandi við árligu pensiónsumrokningina.

Stk. 6. Vísir tað seg við eftirútrokningini, at ein pensionistur hevur fingið eina lægri veiting, enn hann við veruligu inntøkuni sum grundarlag hevði havt rætt til viðkomandi ár, verður avlopsupphæddin útgoldin. Vísir tað seg, at ein pensionistur hevur fingið hægri veiting enn viðkomandi við veruligu inntøkuni sum grundarlag hevði rætt til viðkomandi ár, verður ov nógv útgoldna upphæddin krævd aftur, møguliga við mótrokning í pensiónini teir eftirfylgjandi mánaðirnar.

§ 23. Persónar, sum fáa veiting eftir hesi lóg, skulu boða Almannastovuni frá eini hvørjari broyting í sínum viðurskiftum, sum ætlast at hava við sær, at veitingin lækkar ella fellur burtur.

§ 24. Hevur ein persónur, ið fær veiting, ikki hildið sína upplýsingarskyldu eftir § 23 ella nóti betri vitan av órættum fingið veiting, skal viðkomandi ella deyðsbúgv hansara gjalda aftur ta upphædd, sum er lingin av órættum.

§ 25. Eru munandi broytingar hendar í viðurskiftum, sum hava týdning fyri rættin til fyritíðarpensión, skal málið takast upp til nýggja dóming.

Stk. 2. Pensión eftir § 6 og § 7, stk. 1, nr. 1 og 2 kann hvørki aftursakast ella broytast til hægri ella lægri pensión aftaná fylta 60. árið.

Stk. 3. Rættur til pensión eftir § 7, stk. 1, nr. 3 heldur uppat, um pensionisturin giftist uppaftur. Hetta við endan av tí mánaði, ið kemur aftaná mánaðin, ið viðkomandi verður giftur.

Stk. 4. Pensiónsviðbót verður ikki útgoldin til ein pensionist, sum samhært § 3, stk. 3 fær pensión uttanlands.

§ 26. Almannastovan skal taka avgerð um aftursoku ella yvirflyting til aðra pensión, um týðandi broytingar eru farnar fram í viðurskiftum hjá einum pensionisti, ið fær pensión eftir § 7, stk. 1, nr. 3 og § 8, nr. 2.

Stk. 2. Almannastovan skal reisa málið fyri Vanlukkutryggingarráðnum um aftursoku ella yvirflyting til aðra pensión.

1) um ein fyritíðarpensionistur hevur persónligar arbeiðsinntøkur, sum fara uppum eina upphædd svarandi til dupultu árligu grunduppheddina fyri stsk. smb. tó § 9,
2) um arbeiðsførið er týðandi betrað ella versnað hjá einum pensionisti, smb. § 6, § 7, stk. 1, nr. 1 og 2, § 8, nr. 1 og § 9,
3) um broytingar eru farnar fram í viðurskiftum hjá einum persóni, sum fær avlamisveiting og hjálpar- ella røktarviðbót, sum gera, at roknast má við, at hann ikki longar lykur treytirnar fyri at fáa slíka veiting.

Stk. 3. Tær í stk. 1 og 2 nevndu broytingar kunnu eisini reisast av persóninum sjálvum.

§ 27. Til pensionistar, sum skifta frá fyritíðarpensión til fólkapensión, og sum við umskiftið fingu hjálparviðbót ella røktarviðbót, verða hesar viðbøtur framhaldandi veittar.

Stk. 2. Persónar, sum fáa fyritíðarpensión og avlamisveiting, skifta uttan umsókn til fólkapensión frá 1. í mánaðinum aftaná fylta 67 árið.

§ 28. Rætturin til veitingar samhært hesi lóg heldur uppat við endan av tí mánaði, ein pensionistur doyr.

Stk. 2. Doyr ein giftur pensionistur, og hava bæði hann og hjúnafelagin fingið pensión, hevur eftirsitandi hjúnafelagin rætt til at fáa pensiónina og møguligu persónligu viðbótina hjá báðum tilsamans í 3 mánaðar frá endanum av tí mánaði, pensionisturin doyr. Tó falla møguligar hjálpar-, røktar- og barnaviðbøtur burtur við endan av tí mánaði ein pensionistur doyr.

§ 29. Fær ein pensionistur uppihald á einum stovni fyri persónar við vitlívnandi fíkamligum ella sálarligum breki, sum er góðkendur eftir lógini um almenna forsorg, ella á samsvarandi almennum ella privatum stovni, falla røktar- og hjálparviðbótin burtur við endan av tí mánaði, sum kemur aftaná mánaðin, pensionistarin fær uppihald á viðkomandi stovni.

Stk. 2. Ásetingin í stk. 1 er eisini galdandi fyri pen-

sionistar, sum verða innlagdir á sjúkrahús ella fáa uppihald á ellis- ella røktarheimi, umfram fyri pensionistar, sum av teimum undir stk. 1 nevndu stovnum verða settir í røkt í privatum heimum undir umsjón av einum almennum ella alment góðkendum stovni. Somuleiðis er ásetingin galdandi fyri pensionistar, tá serligar studulsfyriskipanir, sum hava sama endamál sum hjálpar- og røktarviðbótin eru ætlaðar at dekka, verða settar í verk.

Stk. 3. Tá ein pensionistur situr revsing ella er undir øðrum frælsisskerjandi fyriskipanum sambært dómi, verður pensiónin útgoldin honum í 6 mánaðir frá endan av tí mánaði, viðkomandi byrjar at sita dómin av. Pensiónin dettur burtur frestandi revsitíðina. Hjálpar- og røktarviðbót detta burtur við endan av tí mánaði, sum kemur aftaná mánaðin viðkomandi byrjar at sita dómin av.

Stk. 4. Reglur um, hvat annars hendir við pensiónint og um møguligt gjald fyri stovnsuppihaldi, tá ein pensionistur fær uppihald á teimum í stk. 1 og 2 nevndu stovnum, verða ásettar í serligari Løgtingslóg.

Kapittul 7
Upphæddir og javning

§ 30. Í ásetan av pensión o.ø. eftir hesi lóg verða upphæddirnar niðanfyri nýttar:

1) Grundupphædd eftir § 2 er kr. 37.968 um árið, um hjúnafelagin eisini fær fólka- ella fyritíðarpensión og kr. 47.784 um árið í øðrum førum.
2) Pensiónsviðbót eftir § 2 er kr. 7.008 um árið, um hjúnafelagin eisini fær fólka- ella fyritíðarpensión og kr. 8.820 í øðrum førum.
3) Fyritíðarviðbót eftir § 2 er kr. 19.068 um árið, um hjúnafelagin eisini fær fyritíðarviðbót ella avlamisveiting og kr. 22.260 um árið í øðrum førum.
4) Óarbeiðsførtsviðbót eftir § 2 er kr. 22.320 um árið, um hjúnafelagin eisini fær óarbeiðsførisviðbót og kr. 30.852 um árið í øðrum førum.
5) Minstauppheddl eftir § 20, stk. 4 er 1/40 av grunduppheddini.
6) Frádráttur eftir § 21, stk. 3 er kr. 24.100 um árið.
7) Eyka frádráttur fyri arbeiðsinntøkur eftir § 21, stk. 4 er kr. 14.900 um árið.
8) Frádráttur eftir § 21, stk. 5 er kr. 17.800 um árið fyri hjún tilsamans og kr. 12.100 í øðrum førum.
9) Hjálparviðbót eftir § 12, stk. 1, er kr. 22.260 um árið.
10) Røktarviðbót eftir § 12, stk. 2 er kr. 44.412 um árið.
11) Avlamisveiting eftir § 10 er kr. 17.412 um árið, um hjúnafelagin eisini fær avlamisveiting ella fyritíðarviðbót og kr. 21.432 um árið í øðrum førum.

Stk. 2. Í ásetan av pensiónini verður ein giftur persónur javnsettur við ein einsa-mallan, tá samlívið við hjúnafelagan er slitið.

Stk. 3. Tær í stk. 1 ásettu upphæddirnar verða javnaðar eftir reglum, ásettar í serligari løgtingslóg.

Kapittul 8
Umsókn, útgjalding o.a.

§ 31. Veitingar sambært hesi lóg verða bert veittar eftir umsókn.

Stk. 2. Serligt umsóknarblað skal nýtast, tá søkt verður um veiting.

Stk. 3. Við umsóknini skulu fylgja upplýsingar og skjalprógv, sum eru neyðug fyri at avgerð kann taka.

Stk. 4. Almannastovan sendir umsóknina um pensión eftir § 6, § 7, stk. 1, nr. 1 og 2 og § 8, nr. 1 við tilráðing viðvíkandi til Vanlukkutryggingarráðið, smb. §§ 39 og 40. Við umsóknint og tilráðingini frá Almannastovuni skulu fylgja neyðugar upplýsingar og skjalprógv.

Stk. 5. Almannastovan kann av sínum eintingum reisa mál um játtan av veitingum eftir hesi lóg.

§ 32. Almannastovan og Vanlukku-tryggingarráðið kunnu krevja skattamyndugleikar, sjúkrakassar, kommunalar myndugleikar, arbeiðsgevarar og onnur viðkomandi, herímillum sjúkrahús, læknar o.o., ið hava kunnleika til viðurskiftini, eftir upplýsingum av týdningi fyri viðgerð av pensiónsmálum.

§ 33. Pensión eftir § 6, § 7, stk. 1, nr. 1 og 2 og § 8, nr. 1 verður útgoldin frá tí degi, sum er uppgivin í avgerðini hjá Vanlukkutryggingarráðnum ella Den Sociale Ankestyrelse.

Stk. 2. Pensión annars verður veitt frá tí degi, freytirnar eru loknar, tó í fyrsta lagi frá 1. í mánaðinum aftaná dagfestingina fyri móttøku av umsóknini.

§ 34. Tá umsóka um fyritíðarpensión er latin Vanlukkutryggingarráðnum og mett verður sannlíkt, at pensión verður játtað, kann fyritíðarpensión útgjaldast sum forskot.

Stk. 2. Treytin fyri útgjaldan av forskoti er, at umsøkjarin er í eini støðu, sum gevur honum rætt til fyribils kontanthjálp til uppihalds eftir áseetingunum í forsorgarlógini.

Stk. 3. Forskotið verður veitt innanfyri tær upphæddir, sum roknað verður við, at pensiónin fer at verða.
Stk. 4. Um so er at umsøkjarin fær eina lægri pensión, verður munurin at rokna sum hjálp uttan afturgjaldsskyldu eftir lóg um almenna forsorg.

§ 35. Pensiónin verður útgoldin framman-undan eina ferð um mánaðin.
Stk. 2. Flytur ein pensionistur, skal hann geva Almannastovuni fráboðan um nýggja bústaðin.
Stk. 3. Landsstýrismaðurin ásetir, aftaná samráðingar við donsku stjórnina, nærri reglur fyri, hvussu verður við pensiónini, tá ein persónur, sum fær pensión eftir donskum reglum, flytur til Føroya.

§ 36. Verður Almannastovan varug við, at ein pensionistur ikki eigur at hava avgerðarrætt yvir pensiónini, tekur Almannastovan avgerð um, hvussu pensiónin skal útgjaldast. Almannastovan kann, um neyðugt, reisa mál um, at viðkomandi verður gjørdur ómyndugur.

§ 37. Eftir avtalu við sjúkrakassan á staðnum kann Almannastovan afturhalda eini upphædd av pensiónini, sum svarar til sjúkrakassalimagjaldið, ið verður útgoldið beinleiðis til sjúkrakassan.

§ 38. Krøv um veitingar eftir hesi lóg kunnu ikki gerast til mál fyri úttøku ella aðrari rættarsókn. Avtalur um tílík krøv eru ógildugar.
Stk. 2. Krøv um ov nógv útgoldna pensión kunnu mótroknast, tá talan er um upphæddir, sum eru útgoldnar sambært skeivum upplýsingum ella væntandi innlatan av upplýsingum frá viðkomandi.
Stk. 3. Krøv um ov nógv útgoldna pensión, sum stava frá ov stórum útgjaldi til ein pensionist í tíðini frá tilluttingardag til útgjaldingardag fyri pensión hjá hjúnafelaga hansara, kunnu mótroknast í eftirgjaldinum hjá hjúnafelagnum.

Kapittul 9
Vanlukkutryggingarráðið

§ 39. Vanlukkutryggingarráðið tekur avgerð um tillutan, broyting og afturtøku av fyritíðarpensión eftir § 6, § 7, stk. 1, nr. 1 og 2 og § 8, nr. 1, viðhótum eftir § 12 og avlamisveiting eftir § 10, umframt nær treytirnar fyri játtan, broyting og afturtøkut eru loknar.
Stk. 2. Ráðið kann avgera, at eitt mál skal takast uppaftur til kanningar seinni.
Stk. 3. Ráðið kann avgera, at ein pensión í sambandi við afturtøku, skal gjaldast aftur yvir í mesta lagi 12 mánaðir. Harumframt kann ráðið, tá umstøðurnar tala fyri tí, avgera at ræturin til pensión fyribils, tó hægst í 3 ár, skal verða hvílandi.
Stk. 4. Ráðið kann áleggja einum umsøkjara um fyritíðarpensión at møta í ráðnum at geva frágreiðing. Harumframt kann ráðið, grundað á mótrikna frágreiðing, áleggja einum fyritíðarpensionisti at møta í ráðnum at geva frágreiðing.
Stk. 5. Ráðið kann eisini áleggja umsøkjaranum at viðvirka í lýsingini av málinum, millum annað við at lata seg kanna og viðgera av lækna ella innleggja til kanningar og viðgerð.
Stk. 6. Ráðið kann avgera, at málið dettur burtur ella pensión verður tikin aftur í førum, har ein persónur ikki virkar við í neyðugum kanningum, uppvenjing ella øðrum fyriskipanum, sum ætlast at hava við sær munandi betran av arbeiðsførinum.
Stk. 7. Ráðið hevur heimild til at senda ein ella fleiri sakkon at útinna eftirlit á staðnum við at liði til arbeiðsførið ella at kalla fyritíðarpensionistar inn til eftirlit.
Stk. 8. Darvar ein pensionistur kanning ráðsins, kann formaðurin í ráðnum, tá hann metir samanlikt, at ein nýggj avgerð í málinum vil hava við sær, at pensiónin verður tikin aftur, fyribils stoðga útgjaldinginni. Ráðið skal í slíkum førum taka avgerð skjótast møguligt. Útreiðslur til eftirlit verða goldnar av ráðnum.

§ 40. Reglur fyri virksemi hjá Vanlukku-tryggingarráðnum viðvíkjandi málum um fyritíðarpensión o.a. eftir hesi lóg verða ásettar av landsstýrismanninum eftir tilmæli frá ráðnum.
Stk. 2. Fyri virksemi sítt eftir hesi lóg fáa limir ráðsins eina samsýning. Útreiðslurnar av viðgerð ráðsins av málum eftir hesi lóg, verða goldnar av landinum, meðan útreiðslurnar av viðgerðini hjá Den Sociale Ankestyrelse verða goldnar av ríkinum.
Stk. 3. Ráðið sendir árliga landsstýrismanninum og Den Sociale Ankestyrelse frágreiðing um virksemi sítt eftir hesi lóg.
Stk. 4. Møguligur ferðakostnaður, sum stendst av at møta í ráðnum og tann parturin av útreiðslum til viðgerð, sum sjúkrakassin ikki hevur skyldu til at gjalda, verður goldin av ráðnum, eins og leknaváttanir, sum eru umbidnar av ráðnum, verða goldnar av hesum.

Kapitul 10
Kæruvaltur

§ 41. Avgerðir hjá Almannastovuni kunnu sambært

hesi lóg kærast til Kærunevndina í almannamálum.
Stk. 2. Kærast skal innan 4 vikur eftir, at kæraran hevur fingið fráboðan um avgerðina.

§ 42. Avgerðir hjá Vanlukkutryggingarráðnum kunnu sambært hesi lóg kærast til Den Sociale Ankestyrelse.
Stk. 2. Kærast skal innan 3 mánaðar eftir, at kæraran hevur fingið fráboðan um avgerðina.

Kapitul 11
Reglur um gildiskomu og skiftisreglur

§ 43. Henda lóg kemur í gildi 1. januar 1999, og samstundis fer úr gildi lóg nr. 58 frá 15. mars 1967 "for Færøerne om folkepension", smb. lógarkunngerð nr. 103 frá 2. mars 1988, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 37 frá 16. apríl 1997, lóg nr. 55 frá 15. mars 1967 "for Færøerne om invalidpension m.v." smb. lógarkunngerð nr. 101 frá 2. mars 1988, sum seinast broytt við lóg nr. 1131 frá 21. desember 1994, §§ 27-31 í lóg nr. 56 frá 15. mars 1967 "for Færøerne om offentlig forsorg", smb. lógarkunngerð nr. 100 frá 2. mars 1988, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 177 frá 30. desember 1997 og løgtingslóg nr. 36 frá 4. mai 1977 um uppískoytisvetting til einkjur, sum broytt við løgtingslóg nr. 120 frá 29. desember 1983.

§ 44. Persónar, sum til tann 1. januar 1999 høvdu rætt til hægstu, miðal og lægstu avlamispensión eftir § 3 í avlamispensiónslógini, hava framyvir rætt til hægstu, miðal og lægstu fyritíðarpensión eftir ávikavist § 6, § 7, stk. 1, nr. 1 og 2 og § 8, nr. 1 í hesi lóg. Persónar, sum tann 1. januar 1999 høvdu rætt til avlamisveiting eftir § 16 í avlamispensiónslógini, hava framyvir rætt til avlamisveiting eftir § 10 í hesi lóg. Persónar, sum til tann 1. januar 1999 høvdu rætt til hjálpar- og nøkturviðbót eftir § 11 í avlamispensiónslógini ella § 16 í fólkapensiónslógini, fara yvir til sama veiting eftir ávikavist § 12 og § 28, stk. 2 í hesi lóg.
Stk. 2. Kvinnur, sum til tann 1. januar 1999 høvdu rætt til einkjupensión eftir § 27, stk. 1 í forsorgarlógini hava framyvir rætt til miðal fyritíðarpensión eftir § 7, stk. 1, nr. 3 í hesi lóg. Kvinnur, sum til tann 1. januar 1999 høvdu rætt til pensión eftir § 27, stk. 2 í forsorgarlógini, hava framyvir rætt til lægstu fyritíðarpensión eftir § 8, nr. 2 í hesi lóg.
Stk. 3. Persónar, sum til tann 1. januar 1999 høvdu rætt til fólkapensión eftir § 2, stk. 1, nr. 1 í fólkapensiónslógini, hava framyvir rætt til fólkapensión eftir § 4 í hesi lóg. Persónar, sum til tann 1. januar 1999 høvdu rætt til fólkapensión eftir § 2, stk. 1, nr. 2-4, hava framyvir rætt til lægstu fyritíðarpensión eftir § 8, nr. 2 í hesi lóg.
Stk. 4. Pensiónin verður útgoldin við sama tali av fjórutiundapartum av fullari pensión, sum higartil. Tó skulu ásetingarnar í kapittul 6 nýtast. Fyri persónar umfataðir av stk. 2 og 3 verða ásetingarnar í § 25, stk. 1 og § 26 tó ikki nýttar.

§ 45. Uttan mun til ásetingarnar í §§ 14-16 hevur persónur við donskum heimarætti, ið er føddur í 1938 ella fyrr, rætt til fulla fólkapensión, um viðkomandi seinasta árið, áðrenn umsókn um pensión er latin inn, hevur havt fastan bústað í danska ríkinum, ella kann javnsetast við ein slíkan, smb. § 17.

§ 46. Persónar, sum innan 1. januar 1993 eftir reglunum í § 9 í fólkapensiónslógini, sum broytt við lóg nr. 1075 frá 23. desember 1992, hava útsett ella áðrenn hava kunna útsett áheitan um fólkapensión, varðveita rættin til somu viðbót, sum higartil er útgoldin viðkomandi við niðanfyri nevndu upphæddum:
Hjún, tá bæði fóru treytirnar fyri at fáa pensión:
Kr. um árið við útsetan til hin eldri hjúnafelagin fylti
70 ár 3.552
72 ár og seinni 5.436

Einsamøll umframt hjún, tá bert tann eini hjúnafelagin lykur treytirnar:
Kr. um árið við útsetan til fylta
70. árið 2.424
72. árið og seinni 3.516
Einsamallar kvinnur:
Kr. um árið við útsetan til fylta
65. árið 792
67. árið.....1.716

§ 47. Persónar, sum til tann 1. januar 1999 eftir reglunum í § 10 í fólkapensiónslógini høvdu rætt til aldursviðbót, varðveita hesa viðbót við somu upphæddum sum higartil er útgoldin við niðanfyri nevndu upphæddum:
Kr. um árið til hjún, tá bæði høvdu fylt 80 ár:
.....3.132
Kr. um árið til hjún, tá tann eini hevði fylt 80 ár og hin fekk fólkapensión 2.088
Kr. um árið til hjún, tá tann eini hevði fylt 80 ár og hin fekk lægstu avlamispensión.....3.156
Kr. um árið til hjún, tá tann eini hevði fylt 80 ár og

hin fekk miðal ella hægstu avlamispensión....2.628 Kr. um árið til einsamallar persónar, sum høvdu fylt 80 ár, ella giftar persónar, sum høvdu fylt 80 ár, og hjúnafelagin ikki fekk pensión 3.936

§ 48. Pensiónistar, sum til tann 1. januar 1999 eftir § 16 í fólkapensiónslógini, høvdu rætt til avlamisskoyti, varðveita hetta skoyti. Skoytið er 4.716 kr. um árið.

§ 49. Persónar, sum til tann 1. januar 1999 eftir § 3, stk. 4 í avlamispensiónslógini, høvdu rætt til lægstu avlamispensión, og sum, orsakað av inntøku útyvir pensiónina, einans fingu avlamisviðbót, varðveita eina skiftisupphædd av sonu stødd sum higartil útgoldna avlamisviðbótin, um teir ikki tann 1. januar 1999 eftir nýggju reglunum hava rætt til grundupphædd og pensiónsviðbót við í minsta lagi sonu upphædd.

Viðmerkingar

I. ALMENNAR VIÐMERKINGAR

1. INNGANGUR

Galdandi reglur um pensiónir finnast í fólkatingslógunum fyri Føroyar um:

- fólkapensión (smb. lógarkunngerð sosialmálaráðsins nr. 103 frá 2. mars 1988, sum seinast broytt við lóg nr. 1131 frá 21 desember 1994)
- avlamispensión v.m. (smb. lógarkunngerð sosialmálaráðsins nr. 101 frá 2. mars 1988, sum seinast broytt við lóg nr. 1131 frá 21 desember 1994)
- almenna forsorg, §§ 27-31, einkjupensión og pensión til einsamallar kvinnur frá 50 ára aldri (smb. lógarkunngerð sosialmálaráðsins nr. 100 frá 2. mars 1988, sum seinast broytt við lóg nr. 393 frá 22. juni 1993), og í
- løgtingslóg um uppískoytisveiting til einkjur (smb. løgtingslóg nr. 36 frá 4. mai. 1977, sum broytt við løgtingslóg nr. 120 frá 29. desember 1983)

Frá 1. juli 1993 varð allur stuðulin úr statskassanum umlagdur frá eini endurgjaldsskipan til eina heildarveiting. Samstundis varð tann 6. april 1994 avtalað, at rammulóg skuldi gerast fyri sosiala økið.

Við fólkatingslóg nr. 315 frá 17. mai 1995 um almannaveitingar í Føroyum (rammulógini) verður álagt og heimilað føroyska heimastýrinum at gjøgnumføra fyriskipanir fyri í rímiligan mun at fyribyrgja og hvørva um sosialar trupulleikar og at áseta reglur á almannaøkinum. Fyriskipanirnar skulu m.a. fevna um fólka- og fyritíðarpensión, sí § 1, stk. 2, nr. 2 í nevndu lóg.

Lógin hevur við sær, at so hvørt sum heimastýrið útfyllir rammulógina, hevur landsstýrið til ábyrgd, sum áður lá hjá Sosialmálaráðnum, at hava eftirlit við teim reglum, sum løgtingið ásetir, bæði innihaldsliga og viðvíkjandi umsitingini av teimum.

Til nýggjar løgtingslógir eru settar í gildi, verða tær donsku fólkatingslógirnar verandi í gildi.

Ynski um endurskoðan av almannalóggávuni hevur ofta verið frammi í Føroyum, bæði frá politiskari og umsitingarligari síðu. Landsstýrið hevur í 1989 og 1992 sett nevndir at endurskoða almannalóggávuna, men er arbeiðið steðgað upp í báðum førum. Í fyrru nevndini í sambandi við vaf í úrtíð. Seinna nevndin fór frá vísandi til nýggju støðuna, sum hevði tikið seg upp við donsku kravinum í 1993 um umlegging av stuðulsskipanini frá endurgjaldsskipan til heildarveiting.

Arbeiðssetningurin hjá báðum nevndunum var at endurskoða alla almannalóggávuna og at smíða uppskot, sum skuldi gera lóggávuna einfaldari, meira nútímans og tillagað til føroyskar fyritreytir heldur enn verandi hefting at donskum siðum, stovnum og orðingum

Í báðum nevndum varð byrjað við pensiónslógunum. Fyrra nevndin kom nakað áleiðis við arbeiðinum. Nakrar av broytingunum, sum tann nevndin var samd um, ganga aftur í hesum uppskoti.

Lógaruppskotið hevur við sær, at skipanin er broytt soleiðis, at hon gerst meira náttúrligur, einfaldari, nágreinaligari, umsitingarliga meiri rationell og í stórri mun lagað til aðrar fyriskipanir, serstakliga skattaskipanina, sum umsitingin av pensiónslógunum beinleiðis er heft at. Fyriliggjandi uppskot er tilevnað við útgangsstøði í hesum.

1.1. Broytingar eftir fyriliggjandi uppskoti - ein samandráttur:

1. Í uppskotinum eru galdandi lógir um pensiónir samanskrivaðar í eina lóg umfatandi eina fólkapensión og eina fyritíðarpensión í trimum stigum, við hesum broytingum:

a) pensión verður játtað til persónar, ið hava fylt 18 ár. Í galdandi lóg er aldurin 15 ár.

b) vanligi fólkapensiónsaldurin verður 67 ár fyri øll. Einsamallar kvinnur og kvinnur, sum eru giftar við pensionistum, hava í dag rætt til pensión frá 62 ára aldri. Møguligt er hjá øllum at søkja fyritíðarpensión grundað á heilsu-, arbeiðs- ella aðrar serligar umstøður frá 50 ára aldri. Í galdandi lógum hava einkjur og einsamallar kvinnur møguleika at søkja hesa pensión frá 50 ára aldri, meðan onnur kunnu søkja frá 60 ára aldri.

c) fyritreytin fyri at fáa pensión yvirhøvur áðrenn umsøkjarin er fyltur 60 ár er, at tað ikki hevur verið møguligt at útvega arbeiði ella at menna vinnuførleikan hjá viðkomandi; pensión er sostatt einasti forsorgarmøguleiki. Eftir galdandi lóg er hetta einans beinleiðis ásett sum ein fyritreyt, tá talan er um avlamispensión,

d) lægsta avlamispensión er hækkað og broytt soleiðis, at hon í upphæddini og viðgerð verður hin sama sum aðrar fyritíðarpensiónir á fólkapensiónsstøði; engin pensión er sostatt eftir uppskotinum lægri enn fólkapensiónin.

e) í øllum fyritíðarpensiónum verður ein eyka frádráttur gjørdur fyri inntøkur av arbeiði, áðrenn pensiónin verður lækkað; í galdandi lógum er hesin einans galdandi fyri avlamispensionistar,

f) ásetingarnar um hjúnabands-, sjúkrakassa- og aldursviðbøtur verða settar úr gildi. Í uppskotinum verður pensiónsviðbótin hækkað við verandi sjúkrakassaviðbót; aldursviðbótin verður framtaldandi, við skiftisreglu, varðveitt fyri tey, sum fáa hana í dag. Hjúnarbandsviðbótin fellur heilt burtur.

2. Eftir galdandi lóg verður grunduppheddin javnað, tá inntøkan fer uppum eina ávísa upphædd. Í útroknaðinum av grunduppheddini verður ein frádráttur síðan gjørdur í inntøkugrundarlagnum. Eftir uppskotinum verður frádráttarfría inntøkuupphæddin løgd saman við útroknaðarfrádráttinum í inntøkugrundarlagnum, soleiðis at hesar báðar upphæddir tilsamans vera til ein frádrátt í inntøkugrundarlagnum í staðin. Broytingin hevur onga ávirkan á pensiónsupphæddina.

3. Ásetan av inntøkugrundarlagnum fyri javning av pensiónum verður nágreinað og lagað til skattskyldugu inntøkurna. Hervið verður samsvar millum skrásetingarnar hjá skattamyndugleikunum av inntøkum og tá inntøku, ið nýtast skal í pensiónsútroknaðinum. Inntøkur av ogn eru tær inntøkur av fíggjarogn, sum ikki eru skattskyldugar, men avgjaldsskyldugar eftir rentuskattalógini. Frá hesum rentuinntøkum verða rentuútreiðslur drignar, áðrenn nettorentuinntøkan verður løgd afturat skattskyldugu inntøkuni. Hesar framgangga av ognaruppgerðini. Upplýsingar um fíggjarogn og rentuinntøkur av hesi, umframt lán og rentuútreiðslur, verða yvirførdar elektroniskt frá peningastovnunum til Toll & Skattstovuna (til ognaruppgerðina) og til ber til at yvirføra upplýsingarnar elektroniskt frá skattakervinum til pensiónsskipanina.

Eftir galdandi lógum skulu samskipanarfrádráttur í tænastumannaeftirlønum, barnapengar útyvir normalgjaldið og naturaliuinntøkur leggjast afturat inntøkuni. Ískoytið í inntøkugrundarlagnum fyri hesar upphæddir verður ikki gjørt eftir uppskotinum.

4. Eftir galdandi lóg skal pensiónin hjá einum pensionisti, sum seinastu 10 árini hevur minkað um ogn sína við at geva, oyðsla ella á annan hátt hevur handla til fyrimuns fyri børn sini, ella á annan óvanligan hátt hevur minkað um ogn sína, roknast út sum um pensiónistarin ikki hevði handlað, sum hann hevur gjørt.

Mælt verður til, at seta hesar reglur úr gildi, av tí at tær eru ógjørligar at umsita. Tað vil taka pensionistar tilvildarliga, serliga tá tað snýr seg um fastogn, nær og um umsitingin gerst varug við slíka burturgevan.

5. Eftir galdandi lóg skal ein frádráttur gerast í pensiónini, tá pensionistur hevur fingið eitt deyðs- ella av lamisendurgjald hægri enn við 20% avlatni og stendur hesin frádráttur við so leingi, sum pensión verður veitt. Hesin 20%'s frádráttur verður strikaður eftir uppskotinum. Rentuinntøkur av møguligum endurgjøldum verða roknaðar uppí inntøkuna í sama mun sum rentuinntøkur av øðrum fíggjarognum.

6. Reglur um, hvat hendir við pensiónini, tá pensionistur fær uppihald á ellis- og røktarheimi, stovni sambært forsorgarlógini ella líknandi almennum ella atment góðkendum stovni, umframt reglur um møguligt gjald fyri uppihaldið, verða gjørdar í serligari løgtingslóg, sum verður løgd fyri tingið í næstum.

7. Nógvir myndugleikar eru við í fyrisitingini av pensiónum eftir galdandi lóg: kommunustýri, sýslumenn, Føroya Landfúti, Almanna- og Heilsumálastýrið (eisini í einstaklingamálum), Vanlukkutryggingarráðið og Almannastovan. Eftir uppskotinum koma eftans Almannastovan og Vanlukkutryggingarráðið at hava fyrisitingina av einstaklingamálum.

8. Minsta útgjaldingarupphæddin sum kann verða útgoldin eftir galdandi lóg til pensionistar undir 67 ár er 1/6 av grunduppheddini. Ein pensiónsupphædd, sum við inntøkujavning kemur niður um hetta mark, verður ikki útgoldin. Sum tilaðing til innvinningarreglurnar, sum komu í gildi 1. januar 1995 og sum hava við sær, at pensiónin verður útgoldin í fjørutiundapartum, verður hetta mark lækkað niður í 1/40 av grunduppheddini.

9. Herumframt broytingar sum avleiðing av samanskrivingini og umskipanini av lógunum og broyttum málbrúki.

Den Sosiale Ankestyrelse í Danmark er kærumyndugleiki fyri avgerðir hjá Vanlukkutryggingarráðnum um avlamispensión. Henda skipan heldur fram, hóast ongin áseting er um tað í rammulógini. Eftir avtalu tryggjar sosialmálaráðið, at fyritreytirnar fyri tí eru í lagi. Neyðugar tilaðingar verða av donsku myndugleikunum gjørdar í reglunum, soleiðis at avgerðir hjá Vanlukkutryggingarráðnum um fyritíðarpensión vegna avlamni framhaldandi kunnu kærast til Sosiale Ankestyrelsen.

Viðvíkjandi beinleiðis yvirgongd til pensión millum ríkispartarnar ásetir rammulógin, at samráðast skal um spurningin, tá løgtingið hevur samtykt nýggja lóg á økinum. Frammanundan kann tó sigast, at onki synist at vera til hindurs fyri beinleiðis yvirgongd, hvat fólkapensión viðvíkur, tí treytirnar í báðum ríkispørtunum eru, í tí líki, sum uppskotið nú fyriliggur, sera líkar.

Somuleiðis eru treytirnar fyri at fáa fyritíðarpensión líkar. Tí skuldi heldur ikki hetta elvt til trupulleikar. Í Danmark verður tó arbeitt við at endurskoða fyritíðarpensiónsskipanina. Hvat úrslitið av hesum verður, og hvørja ávirkan tað kann fáa, ber ikki til at siga nakað um enn.

1.2. Avleiðingar

Fíggjarligu avleiðingarnar av lógaruppskotinum væntast, tá ein tíð er farin, at fara at verða um 2 mió kr. í meirkostnaði á veitingarsíðuni. Fyrsta árið verður meirkostnaðurin mettur at fara at vera um 6 mió. kr., og minkar hesin líðandi yvir eitt áramál niður í 2 mió. kr. Á rakstrarsíðuni fara neyðugar nyfløgur til løkniútgerð at hava við sær tørv á eini serligari játtan til hetta endamál uppá 4 mió. kr. Viðvíkjandi starvsfólkum verður mett, at tað ikki verður neyðugt við fleiri, men heldur ikki færri fólkum.

2. GALDANDI PENSIÓNSREGLUR

Prinsippið um innvinnan av pensión í mun til bústaðarlíð varð innført í pensiónslógirnar í 1994, tá samtykt varð at verða við í norðurlendska sáttmálanum um sosiala trygd. Hini norðanlondini byggja sínar pensiónir

á hetta prinsipp, og fyri at samskipa, er neyðugt at tillaga seg.

Frammanundan var ætturin til fulla pensiónsveiting, umframt at hava heimarætt í danska ríkinum, einans treytaður av, at viðkomandi hevði fastan bústað í Føroyum, og at viðkomandi hevði búð í ríkinum í minsta lagi 1 ár fyri pensiónstilfatan.

Nú er treytin, umframt ríkisborgarrætt í danska ríkinum og fastan bústað í Føroyum, at viðkomandi hevur havt fastan bústað í minst 3 ár í danska ríkinum frá fylta 15. árinum til fylta 67. árið. Norðurlendski sáttmálin hevur við sær, at frávik verður gjørt fyri hesar reglur, soleiðis at ein norðurlendingur, sum hevur búð í Føroyum í minsta lagi 3 ár, hevur rætt til partvísa pensión í Føroyum, eins og ein føroyingur, ið hevur búð í einum norðurlandi, hevur rætt til pensión í hesum norðurlandi, hóast teir ikki búgva í viðkomandi landi. Treytin er, at viðkomandi byr í einum øðrum norðurlandi ella einum EØS-landi.

Pensión til ein norðurlending, herímillum ein føroying, sum hevur búð í fleiri norðurlondum, verður útgoldin við tilsvarandi partinum av bústaðartíðini í hvørjum landi sær. Full upphædd verður útgoldin við 40 ára bústaðartíð í einum landi. Sum skiftisregla er ásett, at reglurnar um partspensión ikki umfatað persónar við donskum heimarætti, sum eru føddir áðrenn 1. januar 1938, um hesir seinasta árið hava havt fastan bústað í ríkinum. Hetta merkir, at persónar, ið fáa rætt til pensión innanfyri 10 ár frá tí at reglurnar komu í gildi, ikki eru umfataðir av reglunum.

2.1. Fólkapensión

Rætt til vanliga fólkapensión hava øll frá 67 ára aldri; einsamallar kvinnur og kvinnur, ið eru giftar við pensionistum, hava tó rætt til fólkapensión frá 62 ára aldri.

Fólkapensión er samansett av grundupphædd og pensiónsviðbót. Í pensiónsviðbótina er íroknað viðbót fyri sjúkrakassalimagjald.

Til fólkapensiónina verður veitt ein aldursviðbót, tá pensionistarin er blivin 80 ár.

Framskundað fólkapensión kann eftir tørvi, grundað á meting av heilsaviðurskiftum, arbeiðsmoguleikum og øðrum serligum viðurskiftum, tilfatast persónum yvir 60 ár.

Til ein giftan fólkapensionist verður veitt ein hjúnabandsviðbót, um hjúnalagið ikki móttekur pensión.

2.2. Avlamispensión

Hægsta avlamispensión kann tilfatast persónum millum 18 og 60 ár, sum orsakað av avlanni, verða mettir varandi óarbeiðsførir í einhvørji vinnu, ella sum einans hava smávegis arbeiðsevni.

Hægsta avlamispensión er samansett av grundupphædd, pensiónsviðbót, avlamisviðbót og óarbeiðsførisviðbót.

Miðal avlamispensión kann tilfatast persónum millum 18 og 60 ár, hvørs vinnuføri, orsakað av avlanni, verður mett niðursett minni enn hjá einum hægsta avlamispensionisti, tó í minsta lagi við einum triðingi. Harumframt kann miðal avlamispensión tilfatast persónum millum 15 og 18 ár og millum 60 og 67 ár, hvørs vinnuføri er niðursett samsvarandi hægstu avlamispensión.

Miðal avlamispensión er samansett av grundupphædd, pensiónsviðbót og avlamisviðbót.

Til hægstu og miðal avlamispensión verður somuleiðis løgd ein hjúnabandsviðbót, um hjúnalagið ikki móttekur pensión.

Treytin fyri at fáa lægstu avlamispensión er, at viðkomandi er ímillum 15 og 67 ár, og at arbeiðsførleikin varandi er niðursettur við í minsta lagi eini helvt.

Lægsta avlamispensión er samansett av hálvari grunduppheedd og hálvari avlamisviðbót.

2.3. Einkjupensión og pensión til einsamallar kvinnur
Ræt til vanliga einkjupensión hevur einkja, ið hevur uppihaldsskyldu mótvegis einum ella fleiri børnum undir 18 ár.

Einkjupensiónin er samansett av somu upphæddum sum fólkapensiónin við eini uppískoytisveiting eftir løgtingslóg um uppískoytisveiting til einkjur, svarandi til fulla avlamisviðbót.

Einkja, sum hevur móttikið vanliga einkjupensión, hevur rætt til hálva uppískoytisveiting í ár aftaná, at barnið er blivið 18 ár.

Einsamallar kvinnur yvir 50 ár og einkjur, sum hava móttikið vanliga einkjupensión, kunnu eftir tørvi, t.v.s. um heilsuviðurskifti, arbeiðsmøguleikar og onnur serlig viðurskifti taka fyri tí, fáa pensión við somu upphædd sum fólkapensiónin.

2.4. Viðbøtur
Umframt nevndu viðbøtur kunnu pensionistar hava ella fáa rætt til barnaviðbót og hjálpar- ella ræktarviðbót. Barnaviðbótin til lægstu avlamispensión er hálv.

Einkjur hava rætt til barnastyrk sambært lógini um barnagjald til einsamallar uppihaldarar við somu upphædd sum barnaviðbótin, og fáa ikki barnaviðbót til pensiónina.

Ikki-pensionistar kunnu fáa rætt til avlamisveiting.

Allir pensionistar hava skyldu til at vera limir í sjúkrakassa.

2.5. Endamál, støðd og regulering av teim ymsu pensiónupphæddunum (seinast ásettar pr. 1. juli 1993)
Grunduppheddin verður sum útgangsstøði útgoldin til allar pensionistar at gjalda fyri grundleggjandi livikostnaðin. Grunduppheddin er 37.968 kr. um árið, um hjúnalagin eisini fær pensión og 47.784 kr. í øðrum førum. Grunduppheddin til pensionistar undir 67 ár, sum hava aðra inntøku og til pensionistar millum 67 og 70 ár, sum hava arbeiðsinntøku, verður minkað við 60 kr. fyri hvørjar 100 kr., sum inntøkan fer uppum 24.100 kr. árliga. Hjá avlamispensionistum verður ein upphædd uppá 14.900 kr. fyri arbeiðsinntøkur, lagd afturat teimi 24.100 kr., áðrenn grunduppheddin verður minkað. Grunduppheddin er skattskyldug.

Pensiónsviðbótin er serliga ætlað pensionistum utan ella við smáum eykainntøkum at gjalda fyri vanligat livikostnaðin. Pensiónsviðbótin er 7.008 kr. um árið, um hjúnalagin eisini fær pensión og 8.820 kr. í øðrum førum. Pensiónsviðbótin hjá einum pensionisti, giftum við einum pensionisti, verður minkað við 15 kr. fyri hvørjar 100 kr., sum inntøkan fer uppum eina samlaða inntøku hjá hjúnunum uppá 17.800 kr. um árið, í øðrum førum við 30 kr. fyri hvørjar 100 kr., um inntøkan fer uppum 12.100/17.800 kr. um árið. Pensiónsviðbótin er skattskyldug.

Avlamisviðbótin er upprunaliga ætlað til at gjalda tær útreiðslur, sum eru tengdar at brekinum hjá viðkomandi. Gjøgnum árini eru møguleikarnir fyri at fáa endurgjald fyri útreiðslur, ið standast av brekinum, eftir øðrum lógum so umfatandi, at avlamisviðbótin nú í veruleikanum fyri størsta partin fer til at dekka vanligu livikostnaðin. 5 ymiskir satsir eru fyri avlamisviðbótina, treytað av um viðkomandi er giftur við pensionisti, og hvat slag av pensión hjúnafelagin í so fall fær. T.d. er avlamisviðbótin hjá einum støkum persóni 22.260

kr. um árið, meðan hon er 19.068 kr. um hjúnafelagin hevur rætt til sama slag av viðbót. Avlamisviðbótin verður veitt uttan mun til inntøku og er ikki skattskyldug.

Óarbeiðsførisviðbót skal kompensera fyri ventandi inntøkumoguleikar, sum fylgja av fullum óarbeiðsføri. Viðbótin er 22.320 kr. um árið, um hjúnafelagin eisini hevur rætt til óarbeiðsførisviðbót og 30.852 kr. í øðrum førum. Viðbótin verður veitt uttan mun til eykainntøku og er skattskyldug.

Uppískoytisveitingin varð innført í einkjupensiónina, sum frammanundan var sama upphæddd sum fólkapensiónin, fyri at dekka vanliga livikostnaðin hjá forsyrgjandi einkjupensionistum. Veitingin verður minkað í framhaldi av grunduppheddini á sama hátt sum hendan. Uppískoytisveitingin er sama upphæddd sum avlamisviðbótin til stakan persón og er skattskyldug.

Hjúnabandsviðbótin, sum er 4.200 kr. um árið, verður úgoldin til giftar pensionistar, um hjúnafelagin ikki er pensionistur. Viðbótin verður minkað við eykainntøkum á sama hátt sum og í framhaldi av pensiónsviðbótini. Hjúnabandsviðbótin er skattskyldug.

Barnaviðbótin er ætlað til meirlivikostnaðin, sum stendst av at uppihalda børnum, og verður veitt øllum pensionistum, sum hava uppihalds- ella gjaldsskyldu mótvegis børnum undir 18 ár. Tó undantikið, um barnið móttekur barnagjald ella er undir almennari forsorg. Barnaviðbótin er sama upphæddd, sum ásett í lógini um barnagjald til stakar uppihaldarar v.m. t.vs. 669 kr. um mánaðin. Barnaviðbótin er óheft av inntøkumi.

Aldursviðbót verður veitt til fólkapensiónistar yvir 80 ár. Upphæddirnar eru 5 í tali, treytaðar av um pensionisturin er einsamallar, giftur, giftur við pensionisti og hvat slag av pensionisti, hann er giftur við. Fyri ein stakan pensionist er aldursviðbótin 3.947 kr. um árið.

Persónligt ískoyti kann veitast til allar pensionistar, hvørs (fíggjarligu) viðurskifti eru serliga trupul. Ongin avmarking er gjørd í lógini fyri, hvørji endamál persónligar viðbøtur kunnu veitast til, ella støddina av viðbótini. Almannastovan kann avgera, hvørji endamál eru rímlig, nær rímiligt er at veita (inntøku- og ognartreytir) og við hvussu stórari upphædd, aftaná eina íløkiliga meting í hvert einstaka førinum. Landsstýrið kann gera reglur fyri, hvussu veitast skal. Mest vanligu veitingarnar eru ískoyti til heilivág, tannviðgerð, sjúkuviðgerð, o.a. Harumframt verður ofta latið ískoyti til útreiðslur av umvæling og útskiftan av húsarhaldstólum, o.a. Seinnu árini hevur talið av umsóknum um ískoyti til bústaðarútreiðslur verið vaksandi.

Avlamisveiting verður tilkend persóni, hvørs arbeiðsføri orsakað av avlamni læknaliga sæð verður mett samsvarandi tí hjá einum hægsta ella miðal avlamispensionisti, men sum, orsakað av høgari inntøku, ikki verður tilkendur pensión. Veitingin verður útgoldin uttan mun til inntøku og hevur í sínum uppruna sama endamál sum avlamisviðbótin. Avlamisveitingin er 17.412 kr. um árið, um hjúnafelagin fær somu veiting ella avlamisviðbót og 21.432 kr. um árið í øðrum førum, also nú nakað lægri enn avlamisviðbótin, sum hon upprunaliga varð ásett samsvarandi. Avlamisveitingin er ikki skattskyldug.

Hjálparviðbót verður tillutað persónum, sum tørva persónliga hjálp frá øðrum ella eru blindir ella hava nógv niðursetta sjón, og røktarviðbót verður tilluta persónum, sum varandi hava brúk fyri rókt ella støðugari hjáveru til tess at gjalda fyri útreiðslur, ið standast av hesum. Hesar viðbøtur verða veittar uttan mun til inntøku og eru ávikavis 22.260 kr. og 44.412 kr. um árið. Hjálpar- og røktarviðbót eru ikki skattskyldugar.

2.6. Inntøkugrundarlag fyri útrokning av pensiónum

Inntøkur, ið, sum útgangsstøði skulu takast við í grundarlagið, sum pensiónin verður javnað eftir, er bruttoinntøkan, t.v.s. inntøkan uttan skattafrádrátt ella annan frádrátt.

Sambært galdandi reglum skulu allar inntøkur, sum pensionistar hava forvunnið kalendaraárið fyri, roknast uppí, tá inntøkan stavar frá persónligum arbeiði, eftirløn, fastlogn, fíggjarogn, livrentu, privatum ella almennum studningi, lívrentu o.l.

Frá inntøkuni kunnu dragast rakstrarútreiðslur, t.v.s. tær útreiðslur, sum eru nýttar til at vinna, tryggja og viðlíkahalda inntøkuna.

Sosialar pensiónir, barnastyrkur og aðrar samsvarandi sosialar veitingar verða ikki roknaðar uppí. Uppihaldspeningur til børn skal einans roknast uppí við teirri upphædd, sum hesin er hægri enn vanliga barnagjaldið (bidrag).

Sfggjast skal burtur frá samskipanarfrádráttinum sum verður gjørdur í tænastumannaeftirlønum frá stati, landi, kommunum o.ø. T.v.s. at hesin frádráttur skal leggjast aftur at útgoldnu tænastumannaeftirlønini í útrokningini av inntøkugrundarlagnum.

Virðið av naturalium skal leggjast aftrat, og kann Almanna- og Heilsumálastýrið gera retningslinjur fyri inntøkuútrokningina, serfmillum leiguvirði av egnum bústaði. Hesar reglur eru ikki gjørdar.

Um so er, at pensionisturin knappliga hevur mist møguleikan at forvinna sonn arbeiðsinntøku (sum seinasta kalendaraár), skal fyrsta pensiónsútrokningin grundast á ta minnu arbeiðsinntøkuna, sum hann, aftanat broytingina, verður mettur at vera førur fyri at forvinna.

Inntøkugrundarlagið kann broytast í árinum, tá inntøkan hjá einum pensionisti varandi broytist so mikið, at ein nýggj útrokning gevur annað pensiónsúrslit.

Tá allar inntøkur eru samanlagdar sambært omanfyri standandi, verður inntøkugrundarlagið lækkað við eini frádráttarfríari inntøkuupphædd og einum frádrátti við útrokning av grunduppheddini fyri allar pensionistar. Hjá avlamispensionistum verður harumframt drigin ein eyka frádráttur fyri arbeiðsinntøkur. Ein minni frádráttur verður gjørdur í inntøkugrundarlagnum, áðrenn pensiónsviðhøldin verður útroknað.

2.7. 20%'s frádráttur fyri endurgjald

Tá avlamis- ella einkjupensionistur hevur fingið avlamis- ella deyðsendurgjald, ið er eins stórt og tað endurgjald, ið verður veitt við minking av vinnuførinum við yvir 20 % sambært lógini um vanlukkutrygging el. líkn. føroyska, danska ella útlendska lóg, verður ein frádráttur gjørdur í pensiónini. Frádrátturin er 20% av teirri upphædd, sum faktiska rentan ella lívrentan, sum kundi verið keypt fyri kapitaluppheddina, um endurgjaldið varð kapitaliserað, fer uppum eina upphædd uppá í løtuni 8.306 kr. fyri støk og 11.800 kr. fyri onnur.

2.8. Útrokning av pensión í sambandi við burturgeving, óryggiligan og oyðslutan levnað

Um so er, at pensionistur ella hjúnafelagi hansara við hunsara vitan og vilja, seinastu 10 árini fyri pensiónstilfluttan, við handlingum til fyrimuns fyri born ella onnur, ella við oyðsli og óryggiligum levnaði, hevur verað sínni fíggjarligu kor, skal pensiónin útroknast, sum um hann ikki hevði verað sínni kor á nevnda hátt. Tó skal sfggjast burtur frá tí, tð viðkomandi hevur brúkt til uppaling og undirvísing av egnum børnum.

2.9. Pensión og gjald í samband við varandi uppihald á serforsorgarstovnum, ellis- og røktarheimum, sjúkrahúsum, o.a.

Sambært nýggjastu reglunum á hesum øki verður pensión útgoldin óskertd, tá pensionistar búgva í sambylum. Hesir gjalda so fyri uppihaldið við pensiónini.

Hjá persónum við váttfevndandi sálarligum ella likamligum brekum, dettur pensiónin burtur, tá uppihaldið á serforsorgarstovni, psykiatrisku deild e.l. í einum tíðarskeiði uppá 1½ ár er farið úttum 6 mánaðar. Á vanligum sjúkrahúsi (fyri somatiskar sjúkur) verður pensiónin varðveitt uttan tmn til innleggingartíð. Tá detta møguligar hjálpar- og røktarviðbøtur burtur. Somu reglur eru galdandi fyri tey, sum sita revsing e.l. sambært dómi.

Á ellis- og røktarheimum fellur pensiónin burtur, tá uppihaldið er varandi. Í staðin verður lummapeningur útgoldin.

Á ellis- og røktarheimum verður goldið fyri uppihaldið, um so er, at pensiónistur hevur aðrar inntøkur, t.d. tænastumeftirløn, rentuinntøkur, krígsskaðaendurgjald o.t. Eftir lógini skal gjaldast ein upphædd, sum er í mesta lagi 60% av inntøkuni, og í útroknингini skal fyrilit havast fyri burturdoma partinum av pensiónini. Í pensiónslógarinnar fatan er inntøka at skilja sum bruttoinntøka. Í kunngerð galdandi frá 1. apríl 1993 verða reglur gjørdar fyri útroknan av gjaldinum, soleiðis at hetta í staðin skal roknast av inntøkuni, tá skattur er drigin frá.

2.10. Umsitingarmyndugleikar

Tað eru - ríkisumboðsmaðurin undantikin - framvegis sumu myndugleikar, sum nevndir eru undir søguliga partinum um ellis- og avlamisrentuna, sum eru við í umsitingini av pensiónum.

Kommunurnar taka fnóti, kanna og syrgja fyri, at neyðug skjalprógv fylgja við umsóknum um pensión. Tær skulu gera tilráðing um framskundaða fólkapensión, avlamispensión og einkjupensión.

Sýslumaðurin (í Havn, fútin) skal ummæla í sambandi við einkjupensión til einkjur, sum ikki hava børn undir 18 ár og pensión til einsmallar kvinnur yvir 50 ár.

Vanlukkutryggingarráðið avgerð um avlamispensión skal tilkennast o.a., og ger tilráðing um tillutan av framskundaðari fólkapensión, sum Almanna- og Heilsumálastýrið tekur avgerð um.

Annars er tað Almannastovan, sum hevur umsitingina av pensiónslógini um hendi.

3. ATFINNINGAR AT GALDANDI LÓGUM OG UPPSKOT TIL BROYTINGAR.

3.1. Pensiónsskipanin.

Pensiónssløgini eftir galdandi reglum eru:

1) Vanlig aldurstreytað fólkapensión, 67 ár
2) Fólkapensión til einsamallar kvinnur, 62-66 ár
3) Fólkapensión til kvinnur, giftar við pensiónistum, 62-66 ár
4) Framskundað fólkapensión grundað á serligar umstøður, 60 ár
5) Vanlig einkjupensión, børn undir 18 ár
6) Framhaldandi einkjupensión aftaná at børnini eru blivin 18 og pensión til einsamallar kvinnur grundað á serligar umstøður, 50 ár
7) Hægsta avlantispensión
8) Miðal avlatispensión
9) Lægsta avlamispensión

Reglurnar eru at finna í 4 lógum - sí inngangin - og umfata tilsamans yvir 100 lógargreinar, sum, av tí at reglurnar í teim 4 lógunum ganga aftur í so nógvum førum, kunnu niðurskrivast til eitt nógv minni tal av greinum.

Í uppskotinum eru pensiónsreglurnar samskipaðar og samanskrivaðar í eina lóg, sum skal gera samlaðu skipanina greiðari fyri borgara og umsiting. Pensiónirnar verða fólkapensión og fyritíðarpensión í 3 stigum. Treytirnar fyri at fáa fyritíðarpensión eru broyttar soleiðis, at munur ikki longur verður gjørdur ímillum kvinnur og menn, at pensión ikki verður játtað uttan so, at serligar umstøður taka fyri tí (heilsa, arbeidsmøguleikar, annað) og at pensión ikki longur kann játtast til persónar undir 60 ár, uttan so at tað ikki hevur verið møguligt at útvega hóskandi arbeiði ella at menna arbeidsførið soleiðis, at viðkomandi eftir hetta kann ávaka sær eitt arbeiði. Pensiónssløgini verða sambert uppskotinum:

1) Fólkapensión - svarar til 1) omanfyri

2) Hægsta fyritíðarpensión - svarar til 7) omanfyri,
3) Miðal fyritíðarpensión - umfatandi 5) og 8) omanfyri
4) Lægsta fyritíðarpensión - umfatandi 2), 3), 4), 6) og 9) omanfyri.

Vísandi til javnstøðulógina og til, at tað er meira vanligt í okkara døgum, at kvinnur hava sjálvstøðuga lønarinntøku og eru meðuppihaldarar í familjuni, og tí ikki, sum vanligt var, tá upprunaliga fólkapensiónslógin varð sett í gildi, eru heimaarbeiðandi og verða uppihildnar av manninum burturav, verður skotið upp, at kvinnur ikki longur fáa serstøðu í pensiónslógini.

Harafturímóti verður skotið upp, at møguligt verður at veita fyritíðarpensión á lægsta stigi svarandi til fólkapensiónsupphæddina, um treytirnar, sum í dag eru galdandi fyri framskundaða fólkapensión og einkjupensión eftir undantaksregluni, eru til staðar. Hetta uttan mun til, um talan er um kvinnur ella menn. Verður mett, at ásettu treytirnar eru loknar, kann pensión tillutast. Aldurin verður settur til 50 ár, sum í galdandi treytum fyri pensión til einkjur uttan børn og einsamallar kvinnur. Menn skulu sostatt eisini kunna fáa pensión, tíka tær somu treytir.

Ætlanin við nýggju fyritíðarpensiónini er ikki at víðka skaran av persónum, sum hava rætt til pensión ella almannaveiting av einhvørjum slagi. Aftrat persónum, sum longu fáa pensión av hesum slagi (einkjur og einsamallar kvinnur) koma persónar yvir 50 ár, sum í dag fáa ella høvdu havt rætt til varandi veiting. Hetta er ein veiting, sum verður játtað í førum, har ymisk stuðlandi ella aktiverandi tiltøk hava verið úrslitaleys, ella at mett hevur verið frammanundan, at slíkar royndir eru til fánýtis. Komið er sostatt til ta niðurstøðu, at viðkomandi ikki kemur at fáa aðrar møguleikar at skaffa sær og sínum til uppihalds enn við varandi almannaveiting.

Oftast verður komið til hesa niðurstøðu aftaná eina tíð, har viðkomandi hevur fingið fyribils forsorgarveiting vegna arbeiðsloysi ella av øðrum orsøkum. Hetta saman við ymiskum øðrum stuðli, herímillum persónligari ráðgeving og leiðbeining, stuðlit til at finna arbeiði ella endurbúgvandi stuðli av ein hvørjum slagi.

Reglurnar í galdandi lógum hava við sær, at grunduppheddirnar hjá einum fólkapensionisti og einum avlamispensionisti skulu metast í mun til hvørja aðra, og ásetast á annan hátt, enn tá talan er um tveir fólkapensionistar ella tveir avlamispensionistar, sum eru giftir við hvørjum øðrum. Uppskotið hevur við sær, at viðgerðin av øllum pensionistum er eins, uttan mun til, hvat slag av pensión, viðkomandi fær. Tí munur verður einans gjørdur í upphæddum hjá einsamøllum pensionistum og giftum, og ikki, sum í galdandi reglum, eftir pensiónskombinatiónum.

Tá skotið er upp, at heitið verða broytt, er hetta grundað á, at tað ikki verður hildið neyðugt í heitinum at nágreina, av hvørji grund pensiónin er játtað: avlamni, einkjustøðu, samansettum heilsu- og arbeiðstrupulleikum, e.ø.

Systematikkurin er í staðin grundaður á skilmarkan millum fólkapensión, sum øll hava rætt til, tá ávísur aldur er náddur (67 ár) og fyritíðarpensión, sum kann tillutast áðrenn vanligan pensiónsaldur, um serligar varandi forðingar fyri fíggjarligum sjálvbjargni eru til staðar. Tey 3 stigini grundað á veitingarstøðini, sum eisini eru í galdandi lógum. Tó burtursæð frá lægstu avlamispensión, sum skotið er upp at hækka og viðgera á sama hátt sum fólkapensión áðrenn 67 ára aldur eftir galdandi reglum.

Sum avleiðing av broytingini í hetti og álíka samansetingini av pensiónunum, tær eisini "avlamisviðbótin", sum, hvat støddd av upphæddini viðvíkur, eisini í galdandi lóg verður veitt øðrum enn avlamnum, antaað heiti. Galdandi uppískoytisveiting til einkjur er sama upphædd sum avlamisviðbótin, og fáa hesar báðar í uppskotinum tf heitið fyritíðarviðbót.

Pensiónirnar verða eftir uppskotinum samansettar soleiðis:

	Grundupphædd	Pensiónsviðbót	Fyritíðarviðbót	Óarbeiðsførisviðbót
Fólkapensión	x	x		
Lægsta fyritíðarpensión	x	x		
Miðal fyritíðarpensión	x	x	x	
Hægsta fyritíðarpensón	x	x	x	x

3.2. Pensión til børn

Sambært galdandi reglum kann pensión veitast frá 15 ára aldri. Sum kunnugt hava foreldur uppihaldsskyldu mótvegis børnum undir 18 ár. Samfelagsstoðan er broytt grundleggjandi síðan galdandi reglur vórðu innførdar. Flestoll børn fóru tá út at tæna, tí tey vóru fermd. Í dag er meginparturin av børnum í skúla ella undir úthúgving til tey eru 18 ár og longur.

Afturat hesum kemur, at tær meirútreiðslur, sum foreldur at brekaðum børnum hava í mun til onnur foreldur, í dag kunnu endurgjaldast sambært §§ 17 og 18 í forsorgarlógini. Eisini hetta talar ímóti at halda fram við játtan av pensión til børn.

Spurningurin um evt. endurbót til ung (16-17 ára gomul) avlamin vegna væntandi møguleika fyri at skaffa sær inntøku við arbeiði, eftir má í summarmánaðunum, tá onnur ung hava møguleikar fyri tí, eigur at verða tikin upp í sambandi við endurskoðan av forsorgarlógini.

Við omanfyri standandi grundgevingum er skotið upp, at pensión verður veitt frá 18 ára aldri.

3.3. Lægsta avlamispensión

Lægsta avlamispensión hevur, orsakað av upphæddini, verið óheppin, tí hon rekkur ikki til kostnaðin av tí mest neyðturviliga til uppihalds. Tað hevur havt við sær, at ein stórur partur av teimum, sum hava fingið hesa pensión, samstundis hava fingið fiskoytisstuðul upp til fólkapensiónsupphædd sbr. § 13 um varandi veiting í forsorgarlógini, ofta byrjandi við fyribils hjálp eftir § 9 í forsorgarlógini í fleiri ár.

Tað vísir seg nevnuliga, at ein stórur partur ikki fær brúkt síni restarbetósevnt. Og hetta er ikki ein nýggjur trupulleiki við uppruna í verandi stoðu á arbeiðsmarknaðinum.

Lægstu avlamispensionistar hava eftir galdandi reglum rætt til hálva grundupphædd, hálva avlamisviðbót og hálva barnaviðbót. Fær hjúnafelagin miðal ella hægstu avlamispensión verða hálvu upphæddirnar helvtarbýttar einaferð enn. Pensiónsviðbót verður ikki logd aftanat pensión á hesum stigi.

Skotið er upp, at fólkapensiónsupphæddin, sum annars er lægst møguliga pensiónsútgjald, í framtíðini eisini verður veitt teimum, sum framyvir koma at fáa ta pensión, ið svarar til lægstu avlamispensiónina eftir galdandi reglum.

Fult grundupphædd, pensiónsviðbót og evt. barnaviðbót verður sostatt veitt til lægstu avlamispensión eftir uppskotinum, í staðin fyri hálvu grundupphæddina, hálvu avlamisviðbótina og hálvu barnaviðbótina. Upphæddirnar verða javnaðar sum aðrar pensiónir til persónar undir 67 ár. Hetta hevur við sær, at nakrir fáir persónar, sum í dag, orsakað av inntøku, einans fáa hálvu avlamisviðbótina, koma at missa pensiónina. Tí er í skiftisreglu skotið upp, at varðveita hesa í tann mun viðkomandi ikki fær eina pensión eftir nýggju reglunum, sum er eins stór og avlamisviðbótin, ið dettur burtur.

Ein stórur partur av lægstu avlamispensionistunum fara at fáa eina hægri pensiónsveiting enn í dag, men so detta aðrar fiskoytisveitingar sambært forsorgarlógini burtur.

3.4. Tær smáu viðbøturnar

Skotið er upp, at hjúnabandsviðbót, sjúkrakassaviðbót og alderdsviðbót verður tiknar av.

Hjúnabandsviðbótin (350 kr. um mánaðan) verður latin giftum pensionistum, tá hjúnafelagin ikki fær pensión, og verður hon minkað eftir inntøku í framhaldi av minkingini av pensiónsviðbótini.

Hjúnabandsviðbótin er so lítil, at hon ikki røkkur til uppihald hjúnafelagans, skuldi hesin ikki havt egna inntøku. Hevur giftur pensiónistur fíggjarligar trupulleikar, t.d. tí hjúnafelagin ikki hevur arbeitt úti og uppihaldsgrundarlagið tí minkar nógv, tá tann eini gerst pensiónistur, skal meira til enn henda viðbótin til at gjalda uppihald familjunnar. Tí verða møguligir fíggjarligir trupulleikar hjá hjúnum, har tann eini er pensiónistur antin loystir við at tilluta fyritíðarpensión til hjúnafelagan, um viðkomandi lykur treytirnar ella við at veita hjúnafelaganum stuðul sambært forsorgarlógini, møguliga saman við stuðli til endurbúgving, soleiðis at viðkomandi kann verða við til at uppihalda familjuni (yngri fólk). Ein triðjt møguleiki er at veita persónliga viðbót til pensiónistin upp til pensiónsupphædd til hjún í tíðini til hjúnafelagin fær rætt til pensión.

Eftirsum hjúnabandsviðbót verður javnað eftir inntøku, er drúgt at umsita eina yvirgangsreglu, har hon verður varðveitt fyri tey, sum í dag fáa hana. Tí verður skotið upp, at hon fellur heilt burtur.

Sjúkrakassaviðbótin hevur í fleiri ár av umsitingini verið løgd afturat og sædd sum ein partur av pensiónsviðbótini og minkað eftir inntøku saman við hesi. Í uppskotinum verður hon strikað sum sjálvstøðug viðbót, samstundis sum pensiónsviðbótin verður hækkað við samsvarandi upphædd.

Aldursviðbótin (80 ár) hevur helst, tá hon í sínt tíð varð innførd, havt sítt endamál at rinda fyri meirútreiðslur av elli. Slíkar verða í dag veittar, antin sum eyka stuðul til røkt, hjálp, heilivág, sjúkraviðgerð o.s.fr., ella við at pensiónisturin kemur á ellis- og røktarheim, sambyli e.l. Tí er skotið upp, at eisini hon fellur burtur. Tó við yvirgangsreglu varðveitt fyri tey, sum í dag fáa hana.

3.5. Frádrátturin í pensiónini fyri inntøkur (inntøkujavning)

Skotið er upp, at farið verður aftur til at lata grunduppheddina til fólkapensiónistar vera óhefta av inntøkn. Í 1992 varð innførd tann reglu, at arbeiðsinntøkur hjá fólkapensiónistum, 67-69 ár, skuldu hava við sær lækking í grunduppheddini, tá inntøkan fór uppum ávíst mark, meðan tænastupensiónir, rentuinntøkur, krígsskaðaendurgjald o.a. framhaldandi ikki skuldu ávirka.

Eitt av endamálunum við broytingini var sparing. Tá samanum kom, var sparingin lítil, undir 2 mió. kr. Reglan hevur týðiligt sosialt slagsfóð, tí hon rakar tey, sum ikki hava aðrar møguleikar at skoyta uppí fólkapensiónina, enn við smávegis arbeiði nú og tá, til dømis við egning, nøkrum arbeiðstímum á flakavirki, reingerð e.l.

Umsitingarliga hevur tað skapt nógv meirarbeiði at viðgera fólkapensiónina ymist eftir, um talan er um hetta ella hitt slagið av inntøku fyri sama bólk av pensiónistum. Av tí at skrásetingarnar hjá Toll & Skattstovu Føroya ikki hava verið eintýðugar, hvat inntøkusløgum viðvíkur, hevur ikki borið til at automatisera útrokningina.

Alternativið til fyriliggjandi uppskot hevði verið, at grunduppheddin verður javnað eftir øllum inntøkum, bæði arbeiðs- og eftirlønarinntøkum v.m., upp til og við 69 ár. Tað er umsitingarliga lættari at hava við at gera.

Samtíðis gildandi reglum skal grunduppheddin hjá pensiónistum undir 67 ár (undir 70 ár fyri arbeiðsinntøkur) minkast 60 kr. fyri hvørjar 100 kr. um árið, sum inntøkan fer uppum í løtuni 18.900 kr. Síðan skal, áðrenn roknað verður, hjá øllum pensiónistum dragast frá ein upphædd á 5.200 kr. í inntøkugrundarlagnum. Hjá avlamispensiónistum, sum hava inntøkur av arbeiði, skal harumframt gerast ein eyka frádráttur í inntøkugrundarlagnum uppá í løtuni 14.900 kr. fyri arbeiðsinntøkur.

Fyri at gera skipanina einfaldari, er inntøkufrá upphæddin og frádráttarint, sum allir pensiónistar hava rætt

til, í uppskotinum lagdar saman til ein frádrátt uppá 18.900 kr. + 5.200 kr. = 24.100 kr. Útgoldnu upphæddin verður í praksis hin sama, men rættari beinanvegin.

Orðingin í lógini er broytt soleiðis, at grundupphæddin verður minkað við 60 % av árligu inntøkugrundarlagnum (inntøkuni við frádrátti) í staðin fyri 60 kr. fyri hvørjar 100, inntøkan fer uppum ávísa upphædd.

3.6. Inntøkugrundarlagið

At vísa seg sigist inntøkugrundarlagið, sum pensiónsútrokningin skal grundast á og árliga ásetanin av pensiónum eftir nýggjum inntøkum at vera einfalt, sí pkt. 2.6. Í verki hava tó verið stórir trupulleikar.

Fram til 1987 varð umrokningin gjørd "manuelt". Long tíðarskeið undan hvørji umrokning varð nógv yvirtíðararbeiði nýtt til hetta endamál. Tó vóru tað einans tey mál, sum umsitingin frammanundan metti, neyðugt var at kanna - t.d. tí viðkomandi við pensiónstilfatan hevði inntøkut - sum vórðu tikin upp til árliga umrokning. Kommunalu líkningarnevndirnar lótu Almannastovuni skjalprógv um nýggja arbeiðsinntøku, eftirlønarinntøku v.m. Ognarinntøkurnar eru í flestøllum málum ásettar einaferð - eftir upplýsingum á umsóknarblaðnum um pensión og ognaruppgerðini um sama mundi, sum søkt var, um hon yvirhøvur var til. Sostatt var umrokningin inyndað av ávísari tilvild; tó má metast, at hon hevur verið grundað á rimliga rætta arbeiðs- og eftirlønarinntøkur í teint málum, sum yvirhøvur vórðu umroknað.

Í 1987 verður árliga umrokningin automatiserað. Tað at skattamyndugleikarnir skrásettu inntøkurnar elektroniskt, skapti møguleikar fyri, at inntøkuupplýsingar kundu verða yvirførdir beinleiðis frá teldutkipan skattavaldsins til útroknings- og útgjaldsskipanina hjá Almannastovuni. Møguligt var nú at umroknað allar pensiónir eftir inntøku, ið var skattskyldug. Upplýsingar um ognarinntøkur hevur tað tó ikki higartil verið møguligt at yvirføra elektroniskt. Tí hevur ikki verið møguligt at ajourføra útrokningina eftir møguligum broytingum í ognarinntøkum. Hesar inntøkur eru tí einans broyttar, tá pensionisturin hevur gjørt vart við, at hon er ov høgt sett, ella tá Almannastovan í samband við aðrar umsóknir, t.d. um persónliga viðbót, er komin á, at viðkomandi stendur skrásettur við skeivari ognarinntøku.

Automatiseringin vísti seg ikki einans at hava við sær fyrimunir, men eisini vansar, sum komu av, at skrásetingarnar og sundurgreitan av inntøkuslógum, ið eru hóskandi fyri skatta-umsitingina, ikki vóru hóskandi fyri pensiónsumsitingina. Eitt nú, at meðan tað í pensiónsútrokningini er neyðugt at skilja millum tænastueftirlønir og arbeiðsinntøkur, er hetta ikki neyðugt fyri skattaútrokningina. Úrslitið varð, at inntøkurnar skuldu bólkast umaftur manuelt aftaná, at tær vóru komnar inn í pensiónsskipanina. Hesin trupulleiki er nú loystur í ávísan mun við at nýta arbeiðsgevaratølini í sundurgreiningini. Men framvegis er ikki komið á mál.

Í umsitingini hava trupulleikar verið av, at pensiónin eftir galdandi lóg skal roknast eftir inntøkumi hjá pensionistinum seinasta kalendaraárið. Tann 1. januar eru inntøkur pensionistsins seinasta kalendaraár ikki kendar. Tí hava inntøkurnar næstseinasta kalendaraár verið nýttar flestu árini. Tó við onkrum undantakið, har fyribils skrásettar inntøkur seinasta kalendaraár hava verið nýttar. Henda inntøka er væl eftirfarandi í mun til A-inntøkur, men als ikki í mun til aðrar inntøkur, t.v.s. tær sum eru skrásetar undir heitinum B-inntøkur.

Seinnu árini eru komnir fleiri skattligir frádráttir, sum ikki hava verið áður. Ivasamt hevur verið, um teir skulu takast við í útrokningargrundarlagið fyri pensión ella ikki.

Kærunevndin hevur, vísandi til donsku pensiónsreglurnar, sum hon metir kunnu samanberast við tær føroysku, hildið, at allit skal havast við frádráttum fyri framlutt hall av egnum virki.

Landsgrannskoðararnir hava í sínum frágreidingum eftirlýst eini nágreinan av inntøkugrundarlagnum og -útrokningini. Komið verður í grannskoðanarfrágreiningunum inn á niðanfyri nevndu trupulleikar:

- spurningin um "seneste kalenderår" (føroyska lógin) sum inntøkuár fyri ásetan av pensiónini kann tulk-

ast sum "senest afsluttede indkomstår" (danska lógin).

- avmarkan av frádráttum, ið eru umfataðir av hugtakinum "driftsudgifter", herundir um skattligir frádráttir fyri kautiónstap, hall av egnum virki, avskrivingar, gjald til arbeiðsloysisskipanina o.t. eru at rokna sum rakstrarútreiðslur.
- kvalitetin av upplýsingum um ognaravkast, um útrokkan av ognaravkasti (netto/brutto) og vantandi ajourføring av hesum í sambandi við árligu pensiónsásetanina.
- ásetan av virði fyri naturaliuinntøkur, herundir leiguvirði av egnum bústaði.

Støðutakan til omanfyri nevndu ivamál, ið eru reist av grannskoðarum, kartunevnd og Almannastovuni sjálvari, liggja til grund fyri ásetanini í uppskotinum av inntøkugrundarlagnum. Roynt er at definera (avmarka, víðka og tillaga) inntøkuhugtakið og inntøkuárið fyri pensiónsútroknингina í mun til inntøkur í skattligum luøpi og skrásetingar og vtðgerð skattavaldsins av hesum. Inntøkur í pensiónslógarinnar høpi eru bæði inntøkur, ið eru skattskyldugar eftir skattalógini og inntøkur av tíggjarogn, sum ikki verða skattaðar eftir skattalógini. Sí annars viðmerkingarnar til §§ 21 og 22.

Hall av sjálvstøðugum virki, húsaleigu og veðhaldi (kautión), avskrivingar og eftirlønargjøld verða eftir skattareglunum lutvíst endurgoldin av tí almenna í og við, at frádráttur verður gjørdur hesum viðvíkjandi í inntøkuni, áðrenn hon verður skattað. Tap og avskrivingar skulu ikki eisini "endurgjaldast" við hægri pensiónsveitingum. Hinvegin verður hildið rímiligt, at egið gjald til pensiónsuppsparing, sum til sína tíð kann koma at minka um pensiónsveitingar, skulu dragast frá inntøkuni, áðrenn pensiónin minkar eftir hesi. Pensiónsgjøld koma fyrst og fremst uppá tal, har inntøka hjá hjúnafelaga verður roknað við í inntøkugrundarlagið. Tað kemur ikki ofta fyri, at ein pensionistur sjálvur hevur tílíkar eftirlønaruppsparingar, men tað kann tí koma fyri, at fyrrtíðarpensionistar eins og onnur hava gjørt avtalur um uppsparing til aldurdómin. Tá skal henda uppsparing ikki vera við til møguliga at lækka pensiónsupphæddina.

Millum annað tann veruleiki, at ikki allar tíggjarognarinntøkur fult út verða skrásettar sentralt uppá persón og at skrásetingarnar, sum verða gjørdar av rentuinntøkum í ognaruppgerðini í nøkrum førum kunnu vera misvísandi, umframt at Toll & Skattstova Føroya ikki fult út kann eftirkanna sjálvuppgivnar intøkur av rentum og vinningi av innistandandi peningi og virðisbrøvum uttanlands, hevur havt við sær, at umhugsað hevur verið í sambandi við tilevnan av lógaruppskotinum, at taka ognarinntøkur burtur úr inntøkugrundarlagnum. Komið er tó til ta niðurstøðu, at ein so prinsippiell broyting ikki eigur at vera gjørd av fyrisitingarligum grundum, serliga havandi í huga, at nógvar eftirlønir - bæði tær, ið verða uppspardar privat og tær, ið verða uppspardar hjá løntakarum eftir sáttmálum á almenna og privata arbeiðsmarknaðinum - í framtíðini fara at verða útgoldnar sum kapitalur heldur enn sum loypandi eftirlønarveitingar. Men eisini út frá tí sosialpolitiska sjónarmiði, at tað ikki verður mett rímiligt, at arbeiðsinntøkur skulu ávirka pensiónsupphæddina, meðan inntøkur forvunnar av uppsparing, fløgum í virðisbrøv, arvi, rentuspekulatión ella annan hátt, ikki skulu ávirka. Ístaðin fyri eigur at verða arbeitt tram fróti at gera skrásetingarnar av ognarinntøkunum so neyvar sum til ber í mun veruligu ognarinntøkurnar. Eisini skal havast í huga, at tænastumannaeftirlønir verða roknaðar við í inntøkuna, sum pensiónin verður minkað eftir. Í royndini eru hesar hetta eitt annað slag av "uppsparing".

Uppskotið ber í sær, at "naturaliur" ikki fáa annað virði í pensiónsásetanini enn tað, sum ásett verður skattligt t.v.s. í tann mun hesi virði eru partar av skattskyldugu inntøkuni. Somuleiðis verður samskipanarfrádrátturin í tænastumannaeftirlønum, sum áður varð lagdur aftrat útgoldnu tænastumannaeftirlønini, áðrenn pensiónin varð roknað, burtur. Hetta samsvarar við seinastu broytingarnar á hesum øki, tar samskiftisfrádrátturin er tikin av frá 1. januar 1997 at roknað.

Av tí at møguleiki ikki er fyri at fáa fullfíggjaðar upplýsingar um, hvør fær uppihaldsgjald til hvørn, ið er hægri enn vanliga gjaldið eftir lógini um barnagjald til einsamallar uppihaldarar, er reglan í galdandi lóg hesum viðvíkjandi tikin burtur í uppskotinum. Viðmerkjast skal, at talan einans kann verða um heilt fáar, um nakrun pensionist, ið vildi verði ávirkaður av reglini.

3.7 Ásetan av pensión í samband við atgerðir pensionistsins til fyrimuns fyri børn o.a., oyðslandi og óryggiligan levnað

Eftir galdandi lóg skal pensiónin hjá einum pensiónisti, sum seinastu 10 árini hevur verrað síni fíggjarligu kor orsakað av "handlinger til fordel for børn... eller... hans nordentlige eller ødsle levned", roknast, sum um hann ikki hevði verrað síni kor á nevnda hátt. Hetta vil t.d. siga, at ein pensionistur, sum hevur givið burtur tað, hann hevði innistandandi í peningastovni, framvegis skal roknast við teirri rentuinntøku, viðkomandi vildi havt, um hann ikki hevði givið pengarnar burtur. Ella at ein pensionistur, ið hevur átt eini sethús, sum hann áður hevur havt leiguinntøku av, framhaldandi skal roknast við hesi leiguinntøku, um hann gevur húsið til arvingarnar. Reglan hevur verið trupul fyri ikki at siga ómøguligt at umsita. Reglan er einans yvirhildin í málum, har umsitingin av tilvild er komin fram til slíkar ognarmintkingar.

Av tí at tað als ikki ber til at yvirhalda reglina konsekvent, og at hon undir ellum umstøðum er torlør at umsita, verður hon ikki tikin við í fyriliggjandi uppskot.

3.8. 20%'s frádráttur

Í galdandi lóg eru reglur um at mótrokna 20% av ávísum útgoldnum avlamis- og deyðsendurgjoldum í grundupphæddini. Eftir uppskotinum verða hesar reglur settar úr gildi. Um henda frádrátt og grundgeving fyri at taka hann av, sí nærri í fylgisskjølum til lógaruppskotið.

3.9. Avleiðing fyri pensiónina við innleggjan á sjúkrahús, ellis- og røktarheim, o.t. og gjald fyri uppihaldið

Í galdandi pensiónslóg verður ásett, hvussu verður við pensiónini, tá pensionistur hevur varandi uppihald á ellisheimi og røktarheimi, umframt hvussu nógv viðkomandi møguliga skal gjalda fyri uppihaldið av inntøku umfram pensiónina. Tá tað snýr seg um uppihald á øðrum stovnum, t.d. sambylum undir serforsorgini og eldrasambýlum, er heimilað landsstýrinum at ásetta nærri reglur. Reglur eru gjørdar fyri hvørm bústaðin sær, og hevur tað havt við sær, at sera ymist er, hvussu gjaldið er ásett frá stovni til stovn, og hvat tað kostar at uppihalda sær varandi ella fyribils (til umlættingar) á teim ymsu bústøðunum.

Tørvurin á tilboðum er vaksandi. Samstundis er steðgur komin í uppretting av nýggjum røktarheimum, meðan fleiri og fleiri eldrasambýli verða upprættað. Við upprættan av eldrasambýlum er lutvíst farið burtur frá at inndraga pensiónina: í staðin skal pensionisturin varðveita pensiónina og sjálvur gjalda fyri uppihaldið. Broytingarnar, sum hendar eru seinastu árini, gera tað neyðugt at fáa greiðari politikk á økinum, hvat gjalds reglum viðvíkur.

Av omanfyri nevndu grundum er valt at taka reglurnar um gjald fyri uppihald á almennum ella alment góðkendum stovnum úr pensiónslógini og í staðin ásetta nágreiniligari reglur um hesi viðurskiftini í serliguri løgtingslóg, sum verður løgd fyri tingið í næstum, og sum skal koma í gildi samstundis sum fyriliggjandi lóg.

Ásetingarnar í galdandi lóg um, hvat hendir við pensiónini, tá ein pensiónistur fer "inn at sita" (í fongsul) eru varðveittar í uppskotinum. Somuleiðis eru ásetingarnar um, at roktar- og hjálparviðbót falla burtur beinanvegin, tá pensionistur fær uppihald á stovni, sjúkrahúsi e.l., framvegis við í lógini.

3.10. Umsitingarmyndugleikar

Sambært galdandi lógum skulu umsóknir kannast og - í ávísum førum - tilrádingar gerast av kommunustýrinum, áðrenn umsóknir verða sendar víðari til viðgerð á Almannastovuni ella Vanlukkutryggingarráðnum.

Hendan skipan hevur, serliga seinnu árini, ikki riggað væl. Fleiri kommunur hava so at siga verið lhuskuhálsar t avgreiðsluni av pensiónsmálum. Tær upplýsingar, kommununar hvør sær fyrr lótu í umsóknini, fáast nú frá Toll & Skattstovu Føroya, Landsfólkayvirlitinum og øðrum sentralum myndugleikum.

Nakrar kommunur hava onga umsitingarorku yvirhøvur, og tað kemur fyri, at ongin kommunustýrislimur

er at hitta, tá umsóknir skulu latast inn, ella tá Almannastovan hevur fyrispurningar í sambandi við eina umsókn.

Almannastovan hevur nú skrivstovur í Norðoyggjum, Eysturoy og Suðuroy og viðtaludagar í Vágum, og hevur ætlanir um at hava viðtaludagar í - í hvussu so er - Sandoy aftrat. Tað er ein fyrimunur, at fyrispurningar viðvíkjandi umsóknum, ráðgeving og leiðbeining í sambandi við yvirgongd til pensión o.a., verður viðgjørt av teim sakkønu, sum manna hesar deildir.

Brúk er tó framvegis fyri kunnleikanum hjá by- og bygdaráðum í ávísan mun, tá tað snýr seg um viðurskifti á staðnum. Tílíkar upplýsingar kunnu fáast við vanligari hoyring. Ásett er í lógini, at almennir myndugleikar o.o. hava skyldu til at lata upplýsingar, sum eru neyðugar fyri málsviðgerðina.

Í sambandi við tillutan av pensión til einkjur og til einsamallar kvinnur 50 ár og eldri, skal, fyriuttan tilráðing frá kommunustýri, eisini úttala frá sýslumanni (í Tórshavn, fútanum) til, áðrenn støða kann takast. Tá duga í dag at sfggja grundina til hesa reglu. Kommunutilráðingin verður oftast latin sum ein "verður viðmæld" ella "ongin viðmerking" til umsóknina; sama er við úttaluni hjá flestu sýslumonnunum.

Í sambandi við tillutan av framskundaðari fólkapensión eftir galdandi reglum, skal landsstýrið, áðrenn tilráðing frá Vanlukkutryggingarráðnum, taka avgerð. Eftir vanligum nútímans umsitingarsiði, tekur ovasti politiskt/administrativi myndugleikin ikki lut í avgerðum um einstaklingamál.

Almannastovan er, við sínum fakútbúgvna starvsfólki, fer fyri at rnela um eina pensión, ið skal grundast á sosialu heildarstøðuna hjá viðkomandi umsøkjara. Eftir uppskotinum verður tað Almannastovan, sum, umframt tær uppgávur, sum hon í dag hevur, kemur at átaka sær tann leiklut, sum kommunurnar og sýslumenn/-fúti hava sambært galdandi lóg, t.v.s. at taka ímóti og kanna umsóknir, gera tilráðing um avlamispensión og taka avgerðir um sosialt treytaðu fyritíðarpensiónirnar. Og at Vanlukkutryggingarráðið framvegis letur pensión, grundað á varandi likamligt/sálarligt avlamni.

4. FÍGGJARLIGAR AVLEIÐINGAR

Sambært útroknингum Almannastovunar, sí nærri í fylgisskjølunum, verða fíggjarligu avleiðingarnar av uppskotinum mettar at verða:

Meirkostnaður:		**Minnikostnaður:**	
	Kr.		Kr.
Grundupph.: 67-69 ár	2.663.904	Hjúnabands-	247.000
20%'s frádráttur:	269.000	viðbót	
Lægsta fyrtíðarpens.:	2.623.000		
Barnaviðbót (1/2-heila):	292.500		
Avlamisviðbót:	267.200		
Einkjupensjón:	105.000		
Tilsamans	6.220.604	Tilsamans	247.000

Umframt nevnda meirkostnað kemur, at grunduppheddin ikki longur verður javnað eftir inntøku hjá fólkapensionistum 67-69 ár, at hava við sær, at nakrir pensionistar fara at koma inn í skipanina, sum ikki eru við í dag. Mett verður ikki, at talið er stórt.

Umframt nevndu sparingar (minnikostnaðin), koma sparingar av aldursviðbótini (4,3 mió yvir eitt áramál) og bíðiviðbótin (172.000 kr yvir eitt áramál) og á forsorgarøkinum av at lægsta avlamispensión verður hækkað, umframt av at pensión ikki verður veitt til børn framyvir.

Nýggj tøkniútgerð, sí niðanfyri, verður mett at fara at kosta umleið 4 mió. kr.

5. UMSITINGARLIGAR AVLEIÐINGAR

5.1. Arbeiðsorka

At pensiónsskipanin verður einfaldari at umsita, hevur við tíðini við sær, at minni orka skal nýtast til at umsita sjálvar veitingarnar. Verður edv-kervið tíðarhóskandi, og nóg nógv tíð sett av til fyrireikingar, t.v.s. tíl hjá landsstýrismanninum at gera kunngerðir, leiðbeiningar, oyðiblað o.s.fr., áðrenn lógin verður sett í gildi, verður mett, at tørvurin á starvsfólki til sjálvur pensiónsveitingarnar verður væl minni enn í dag.

At kommunustýrini fara úr skipanini hevur við sær, at partur av tí spardu orkuni skal nýtast av Almannastovuni til tær uppgávur, kommunurnar hava havt.

At Almannastovan skal gera tilráðing í sambandi við umsókn um fyritíðarpensiónir, áðrenn tær verða sendar til Ráðið og at pensión ikki verður veitt, uttan so at roynt er frammanundan at finna arbeiði ella at endurskapa arbeiðsførið hjá einkjum og einsamøllum kvinnum, sum áður hava fingið eina pensión uttan hesa treyt, hevur við sær meirarbeiði. Men av tí at Almannastovan frammanundan, sum fylgja av síni ráðgevingar- og leiðbeiningarskyldu, hevur verið nettiliga nógv inni í viðgerðini í slíkum málum, er avmarkað, hvussu nógv meirarbeiði, stuðulin til útvegan av arbeiði ella endurhúgvingarroyndir í veruleikanum fer at hava við sær.

Samanumtikið verður mett, at avleiðingin av lógaruppskotinum verður status quo, hvat starvsfólkatørvi á Almannastovuni viðvíkur. Sí nærri í viðmerkingunum til tær einstøku greinirnar frá Almannastovuni hesum viðvíkjandi í fylgisskjølunum, har komið verður inn á viðurskifti, tá hava við sær meirarbeiði. Almannastovan kemur tó ikki inn á minniarbeiðið, sum stendst av, at lógin annars verður einfaldari at umsita.

5.2. Tøkniútgerð

Edv-útgerðin á Almannastovuni virkar langt frá nøktandi. Hon er gomul, krevur nógvar bæði smáar og stórar batar fyri yvirhøvur at kunna nýtast forsvarliga sum er, og hon er ikki dimensionerað til brúkaratørvin.

Mett verður neyðugt at keypa nýggja útgerð og at forrita pensiónsskipanina av nýggjum, at nýggj kravfesting til skipanina verður gjørd, og at umprogrammering fer fram frá botni av. Arbeiðið við forritan má gerast av sakkønum uttanfrá. Kravfestingaruppgávan kann gerast av kønum í umsitingini.

Metti kostnaðurin av at skifta út edv-skipanina er umleið 4 mió. kr.

Sí nærri í viðmerkingunum frá Almannastovuni hesum viðvíkjandi í fylgisskjølunum.

6. VIÐMERKINGAR FRÁ UMMÆLANDI STOVNUM, FELØGUM OG RÁ_UM

Lógaruppskotið varð sent til ummælis á Almannastovuni, Vanlukkutryggingarráðnum, Toll- & Skattstovu Føroya, Sosialráðgevarafelag Føroya, Eldraráðnum, Ráðnum fyri Brekað, Føroya Kommunufelag, Tórshavnar Kommunu, Klaksvíkar Kommunu, Runavíkar Kommunu og Grannskoðanardeild Landskassans, og eru ummæli komin frá teim flestu.

Ummælini hava í ávísan mun havt við sær, at ásetingar eru broyttar samsvarandi tilmælum frá teim ummælandi. Dentur verður av Almannastovuni, Tórshavnar kommunu og Ráðnum fyri Brekað lagdur á, at góð tíð verður sett av til fyrireikingar, áðrenn lógin verður sett í gildi, t.v.s. at kunngerðir, leiðbeiningar, oyðiblað o.a. eru til taks fyri umsitingina, áðrenn lógin fær gildi og at tøkniútgerðin er soleiðis, at lógin í øllum, sum til ber, kann umsitast rætt og forsvarliga elektroniskt.

Ístaðin fyri at greiða frá her, hvat í hesir stovnar og onnur hava greitt frá í viðmerkingunum, eru allar viðmerkingarnar lagdar við sum fylgiskjøl.

II. VIÐMERKINGAR TIL EINSTØKU GREINIRNAR

Ad § 1.

Í greinini verður víst til heimildina til at áseta reglur um sosialar pensiónir, sonevndu rammulógina fyri almannaveitingar í Føroyum.

Ad § 2.
Ásett verður, hvørjar veitingar (pensión og viðbøtur) henda lóg umfatar, hvussu pensiónirnar eru samansettar, og hvørjar viðbøtur kunnu latast til pensiónirnar, um treytirnar fyri at fáa hesar eru loknar. Pensión verður definerað sum fólka- og fyritíðarpensión, avlamisvetting og veitingar sambært skiftisreglurnar í kap. 11. Krónutalið fyri tær ymsu upphæddirnar er ásett í § 30. Í almennu viðmerkingunum undir pkt. 2.5. verður víst á, hvat ætlanin varð at hesar upphæddirnar skuldu dekka. Onki er innihaldsliga broytt hesum viðvíkjandi í hesi lóg. Einans heitið eru broytt. Tó er tann fyritíðarpensión, ið svarar til lægstu avlamispensión, broytt í samanseting og hækkað til sama støði sum fólkapensión. Sí nærri um broytingarnar undir 3. parti í almennu viðmerkingunum.

Ad § 3.
Almennu treytirnar fyri at fáa pensión eftir hesi lóg (ríkisborgaraskapur, fastur bústaður o.a.) verða ásettar í hesi grein. Í fyrsta lagi verður danskur heimarættur sett sum ein treyt. Høvuðsreglan er, at viðkomandi hevur danskan heimarætt ella er giftur við ella seinast hevur verið giftur við einum persóni, ið hevur danskan heimarætt. Ein persónur við heimarætti í einum øðrum landi, ið hevur verið giftur við einum persóni við donskum heimarætti, varðveitir rættin til pensión, um viðkomandi verður skildur ella hjúnafelagin doyr, treytað av, at viðkomandi ikki aftaná giftisi við einum persóni, ið ikki hevur danskan heimarætt. Hetta tó eisini treytað av, at viðkomandi samstundis lýkur treytirnar viðvíkjandi fastum bústaði í Føroyum og 3 áru bústaðartíðina ella er umfatað av reglum í sáttmálum við onnur lond.

Undantaksvís kann landsstýrismaðurin í serligum førum gera frávik frá reglini um danskan heimarætt fyri persónar, sum hava búð minst 10 ár í Føroyum frá fylta 15. árinum til fylta 67. árið, harav seinastu 5 árini beint áðrenn pensión verður tilluttað. Ítøkilig dømi eru um persónar við ríkisborgararætti í einum landi, sum ongin sáttmáli er gjørdur við, men sum nærum ein mansaldur hava arbeitt og tænt landinum í samstarvi við persónar úr londum, sum sáttmáli er gjørdur við. Hesi seinast nevndu hava sambært sáttmála rætt til pensión aftaná 5 ella 10 ára bústaðartíð, meðan teir fyrst nevndu ikki hava henda møguleika. Tí er rímiligt at heimila landstýrismanninum at gera undantøk frá kravinum um danskan heimarætt í tílíkum serligum førum, um viðkomandi ikki hevur innvunnið sær rætt til eina pensión í viðkomandi landi, ið er eins høg og føroyska pensiónin.

Í øðrum lagi verður sett sum treyt fyri tilluttan og útgjaldi av pensión, at viðkomandi hevur fastan bústað í Føroyum ella hevur hyru við skipi skrásett í Føroyum. Bústaðarkravið er sostatt uppfylt hjá einum persóni við donskum ríkisborgararætti, sum hevur hyru við føroyskum skipi, uttan mun til um hann byr í Føroyum ella uttanlands. Hvørjar treytir skulu verða uppfyltar fyri at fáa eitt skip skrásett í Føroyum, eru ásettar í løgtingslóg nr. 9 frá 05. mars 1970 um skráseting av skipum, seinast broytt við løgtingslóg nr.75 frá 23. mai 1997. Í teirri løtu viðkomandi ikki longur hevur hyru við føroyskum skipi og framvegis býr í útlandinum, fellur rætturin til pensión burtur. Er pensiónin tilluttað, meðan viðkomandi hevði hyru við føroyskum skipið, kann viðkomandi søkja um framhaldandi útgjald eftir reglunni í stk. 3, 2. pkt. Landsstýrismaðurin kann gera undantak frá kravinum um fastan bústað í Føroyum, um so er, at pensionisturin búsetist uttanlands aftaná at hava fingið tilluttað pensión.

Í triðja lagi verður sett sum treyt, at viðkomandi skal hava búð í Føroyum í minsta lagi 3 ár frá fylta 15. árinum til fylta 67. árið. 3 áru bústaðarkravið er galdandi fyri líknandi veitingar í øllum nordanlondum.

Frá treytunum um heimarætt og fastan bústað/hýru við føroyskum skipi, kann landsstýrismaðurin gera reglur um undantak, tá sáttmáli er gjørdur við onnur lond um hetta. Av sáttmálum, sum Danmark hevur gjørt við onnur lond, eru hesir galdandi fyri Føroyar: Norðurlond, Stórabretland, Frakland, Schweiz. Av hesum er tann norðurlendski mest víttgangandi.

Ad § 4.
Í greinini verður aldurin fyri at fáa fólkapensión ásettur at verða 67 ár.

Ad § 5.
Í greinini verður ásett, at fyritíðarpensión ikki verður játtað persónum undir 60 ár, um til ber at stuðla viðkomandi persóni til fíggjarligt sjálvbjargni við at finna eitt arbeiði, eitt arbeiði, ið er í samsvari við hansara/hennara evnir, kreftir og persónligu og fakligu førleika, ella við at stuðla til endurskapan av arbeiðsførinum við viðgerð, endurbúgving e.a. Hendu treyt skal eisini setast í samband við, hvar viðkomandi hevur og framhaldandi fer at búgva, arbeiðsmøguleikarnar á staðnum, møguleikarnar fyri at flyta, tað rímiligt ið at krevja, at viðkomandi flytir hagar arbeiðið er og útbúgvingarmøguleikar eru, umframt til hvussu nær teirrum 60 árunum, viðkomandi er.

Ad § 6.
Í greinini verða ásettar nærri treytir fyri at fáa hægstu fyritíðarpensión. Viðkomandi skal hava fylt 18 ár og vera undir 60 ár, tá umsóknin verður latin inn. Viðkomandi skal vera likamliga ella sálarliga avlamin. Eftir metingini sambært § 9 skal viðkomandi vera óarbeiðsførur í eini og hvørji vinnu ella einans hava smávegis eftir av arbeiðsførleikanum. Grundgevingin fyri, at persónar, ið eru fyltir 60 ár ikki fáa hægstu avlamispensión er, at tíðarskeiðið til viðkomandi skal liva av fólkapensión er so stutt, at óheppi kann verða at áseta pensiónina á uv høgum stigi so seint, heldur enn at laga veitingina og harvið fivistøðið til seinnu lækkingina, sum verður, tá viðkomandi sum 67 ára gamal fer at liva av fólkapensión.

Ad § 7.
Í greinini verða ásettar nærri treytir fyri at fáa miðal fyritíðarpensión. Fyri at fáa miðal fyritíðarpensión grundað á avlamni, skal viðkomandi vera frá 18 til og við 66 ár. Viðkomandi skal vera likamliga ella sálarliga avlamin og eftir metingini sambært § 9, skal arbeiðsførið hjá viðkomandi verða minkað við í minsta lagi 2/3. Fyri at fáa miðal fyritíðarpensión grundað á uppihaldaramiss (einkjustøðu) skal viðkomandi hava uppihaldsskyldu mótvegis barni ella børnum undir 18 ár. Bæði kvinnur og menn hava rætt til hesa pensión. Skiftisreglan í galdandi lóg um at varðveita helvtina av fyritíðarvirðbótini, sum annars vildi fallið burtur, tá yngsta barnið gjørdist 18 ár, verður tikin við í hesi lóg.

Ad § 8.
Í greinini verða ásettar treytir fyri at fáa lægstu fyritíðarpensión. Fyri at fáa lægstu fyritíðarpensión grundað á avlamni, skal viðkomandi vera frá 18 til og við 66 ár. Viðkomandi skal vera likamliga ella sálarliga avlamin og eftir metingini sambært § 9, skal arbeiðsførið hjá viðkomandi verða minkað við í minsta lagi eini helvt.

Lægsta fyritíðarpensión grundað á samansettar sosialar trupulleikar, sum sambært fyrrverandi galdandi reglum, kundi veitast til einsamallar kvinnur yvir 50 ár, einkjur í framhaldi av vanligu einkjupensiónini, tá treytirnar fyri hesi ikki longur vórðu loknar og persónar annars yvir 60 ár, sum orsakað av viknandi heilsu, væntandi vinnumøguleikum ella øðrum serligum umstøðum, kundu metast at hava ein varandi forsorgartørv, kunnu eftir hesi lóg veitast til allar persónar yvir 50 ár - bæði kvinnur og menn. Grundað á eina heildarmeting av sosialu støðuni í løtuni og útlitunum framyvir í tí einstaka førinum, er komið fram til, at viðkomandi ikki metist at verða førur fyri at klára seg sjálvstøðugt fíggjarliga uttan framhaldandi veiting frá tí almenna. Ætlanin er ikki at víðka persónskaran í mun til fyrrverandi galdandi lóg. Tó kunna persónar yvir 50 ár, sum fáa ella vildu fingið varandi veiting sambært § 13 í forsorgarlógini, í staðin at fáa eina pensión. Hjá persónum, ið fáa varandi veiting er støðan tann, at allir møguleikar at stuðla viðkomandi í at gerast sjálvbjargin fíggjarliga hava verið til fánýtis ella frammanundan verða metnir útlitaleysir.

Ad § 9.
Í greinini verður nærri ásett, hvørji viðurskifti skulu gera seg galdandi í dømingini av mistu arbeiðsførinum, tá pensiónsstigið vegna fikanligt ella sálarligt avlamni skal setast. Ein meting skal gerast av, hvat viðkomandi við sínum avlamni kann væntast verða førur fyri at forvinna av inntøku. Hetta sæð í mun til útbúgving og arbeiði fyrr og samanborið við, hvat persónar, ið ikki hava heilsutrupulleikar, við samsvarandi útbúgving og royndum kunnu forvinna í sama øki. Aldur, lívsstarv, bústaður, arbeiðsmøguleikar og líkindi fyri betran ella versnan av avlamninum, umframt aðrar serligar umstøður, sum hildnar verða hava týdning í tí einstaka málinum, skulu takast við í metingini av skerda arbeiðsførinum.

Ad § 10.
Avlamisveiting verður tilluttað, tá ein persónur eftir eini teknaligari døming av avlamminum vildi havt rætt til hægstu ella miðal fyritíðarpensión, men sum hevur og framyvir væntast at koma at hava so mikið av inntøku, at hesar pensiónir ikki kunnu verða veittar, grundað á dømingina eftir § 9.

Ad § 11.
Barnaviðbót verður veitt einum pensionisti, um so er at viðkomandi hevur uppihaldsskyldu mótvegis einum barnið undir 18 ár. Einans ein barnaviðbót verður útgoldin fyri hvørt barnið. Eru báðir uppihaldarnir pensionistar, verður barnaviðbótin einans útgoldin til tann, sum í høvuðsheitum uppiheldur ella hevur uppihildið barninum. Búgva foreldrini ikki saman, verður barnaviðbótin útgoldin tí, sum hevur skyldu at rinda barnagjald til barnið.

Barnaviðbótin verður ikki veitt, um pensionisturin fra hinum foreldrapartinum við uppihaldsskyldu fyri sama barni fær barnagjald, antin beinleiðis ella forskotsvís av tí almenna. Á sama hátt, sum barnagjald eftir løgtingslóg um barnagjald til einsamallar uppihaldarar ikki verður útgoldin, um foreldrini búgva saman, verður barnaviðbót heldur ikki veitt til pensiónina, um viðkomandi byr saman við tí, ið hevur uppihaldsskyldu fyri sama barni, og hesin ikki er pensionistur.

Barnaviðbót verður heldur ikki útgoldin/veitt, um pensionisturin fær barnagjald eftir 2. parti í løgtingslóg um barnagjald til einsamallar uppihaldarar ("einkjubarnastyrk") ella um barnið verður uppihildið av tí almenna eftir lóggávuni um almenna forsorg ella barnaforsorg.

Ad § 12.
Hjálpar- ella røktarviðbót kunnu, av Vanlukkutryggingarráðnum, tilluttast bæði fyritíðarpensiónistum og persónum, ið fáa avlamisveiting. Hjálparviðbótin er ætlað at dekka útreiðslur, ein blindur persónur, ein persónur við nógv niðursettari sjón ella ein persónur, grundað á annað slag av avlamni, væntast at havi sum avleiðing av, at viðkomandi er bundin av støðugt at fáa hjálp frá øðrum. Røktarviðbótin, ið er ein hægri veiting, verður tilluttað, um viðkomandi hevur tørv á varandi røkt ella støðugari umsjón, tí viðkomandi als ikki kann klára seg uttan at hava onnur um seg, so at siga all samdøgrið.

Samsýning fyri at ansa eldri og óhjálpnum heima hevur sama endamál sum røktarviðbótin, men verður heldan veitt til tann, ið ansar, meðan røktarviðbótin verður veitt til tann óhjálpna at løna øðrum av. Tí er ásett, at ein tilluttað hjálpar- ella røktarviðbót ikki verður útgoldnar, um so er at pensiónisturin verður ansaður eftir reglunum í løgtingslógini um samsýning fyri at ansa eldri og óhjálpnum heima. Hjálpar- og røktarviðbótin verður tó tikin uppaftur, um ansingarsamsýningin steðgar.

Ad § 13.
Persónlig viðbót kann verða veitt pensionistum, sum hava serliga trupul kor. Fyrsta fyritreytin fyri at veita persónliga viðbót er, at talan er um stuðul til eina rímiligt grundaða stakútreiðslu ella til rímiligar og neyðugar framhaldandi útreiðslur hjá pensionistinum. Mett verður, um tað, sum pensionisturin søkir um eyka stuðul til, er neyðugt og rímiligt, um kostnaðurin er á einum rímiligum støði, ella um trupulleikin kann loysast á annan ódyrari hátt. Onnur fyritreytin er, at pensionisturin ikki fíggjarliga er førur fyri at bera útreiðsluna sjálvur. Kannað verður um pensionisturin sjálvur hevur pening at gjalda fyri, ella um hann hevur fastogn ella leysafe, sum við sølu kann geva pensionistinum tann pening, sum søkt verður um ískoyti til. Somuleiðis verður inntøka hjá pensionistinum kannað, og mett verður, um inntøkan er á einum slíkum støði, at viðkomandi átti at verið førur fyri sjálvur at gjalda. Tá talan er um fyritíðarpensionistar verður ein ítøkilig meting av fíggjarfiga tørvinum gjørd sum grundarlag fyri støðutakanini til stuðul. Høstu útreiðslur pensionistsins, ið verða mettar neyðugar, verða sammettar við inntøku hansara.

Um so er, at neyðugt er at veita stuðul til framhaldandi útreiðslur av lánum til egnan bústað pensionistsins, skal tann parturin av stuðlinum, ið verður veittur til avdrátt av lánunu rindast aftur. Hetta grundað á sjónar-

miðið, at tað almenna ikki eigur at veita stuðul til økjan av ognini hjá einum borgara. Tílíkur stuðul verður einans latin í undantaksførum, tá allir aðrir møguleikar eru royndir, herundir møguleikarnir fyri at umleggja lánini soleiðis, at pensionisturin sjálvur kann gjalda, umframt at meting er gjørd av møguleikanum fyri og tí rímiliga í, at pensionisturin selir ognina og finnur sær ein annan ódyrari bústað, sum hann sjálvur er førur fyri at rinda kostnaðin av.

Tað kunnu vera onnur enn tey fíggjarligu viðurskiftini, sum gera korini sera trupul. Eitt nú, um pensionisturin er í eini leestari støðu, tí viðkomandi tørvar serligan stuðul frá øðrum fyri at klára seg í gerandisdegnum, og tær hjálparfyriskipanir (bústovnar, vard verkstøð, dagheim, heimarøkt, e.a.t.), sum tað almenna hevur at bjóða, eru avmarkaðar, ella ikki egna seg at loysa júst hann trupulleika, viðkomandi hevur. Í tílíkum serligum førum kann stuðul verða veittur til viðkomandi sum persónligt ískoyti. T.d. hevur avmarkaða útboðið í mun til tørvin av serligum hjálparfyriskipanum til persónar, ið bera viðgongd likamlig ella sálarlig brek, havt við sær, at Almannastovan tey seinnu árini hevur sæð seg noyddan til í fleiri førum at seta inn við serligum stuðulstiltøkum, har stuðulsfólk verða sett óvíst tíðatal at vera um og/ella at menna førleikan hjá viðkomandi til sjálvur at klára seg í gerandisdegnum. Í tílíkum málum hevur fyriskipanin ikki verið veitt út frá fíggarorkuni hjá viðkomandi, tí hetta hevur ikki verið mett rímiligt, tí grundin til tiltakið hevur sína ursøk í vientandi tilboðum til hesi fólk á serstovna- ella heimarøktarøkinum.

Ad §§ 14 - 16.

Reglurnar um innvinnan av pensitón komu í gildi pr. 1. januar 1995 sum tillaging til "Nordisk konvention om social sikring", sum Føroyar samtykti at taka undir við og undirskrivaði 8. juli 1994. Reglurnar í forsorgarlógini um einkjupensión, sum eftir fyrrverandi lóg ikki hava verið umfataðar av konventiónini, koma við hesi lóg at verða umfataðar, eins og samsvarandi pensiónir í hinum norðanlondunum eru.

Reglurnar um innvinnan av pensión eftir bústaðartíð eru við norðurlendsku konventiónini gjørdar eins fyri øll norðurlond. Í fyrsta lagi hava tær við sær, at pensión skal roknast í mun til innvinningartíðina, t.v.s. tá tíð ein hevur búð í einum norðurlandi. Hevur ein pensionistur búð í fleiri norðurlondum, fær hann pensión í hvørjum landi sær í mun til bústaðartíðina.

Veitingar eftir lógini skulu kunna tilflutast og útgjaldast til ein norðurlendskan umsøkjara, sum hevur búð fast ella starvast í Føroyum, hóast hann byr í einum øðrum Norðurlandi ella í einum landi, sum er limur av EØS.

Pensiónirnar verða útroknaðar eftir reglunum í hvørjum norðurlandi sær, og hevur hetta við sær, at ein føroyingur, sum hevur búð t.d. í Svøríki, kann fáa pensión haðani við síðuna av føroysku pensiónini, uttan at hendan verður lækkað í mun til fulla føroyska pensión. Somuleiðis skulu føroyingar gjalda pensión til ein norðurlending, sum byr í øðrum norðurlandi ella í einum landi innanfyri EØS-økið, um hann áður hevur havt fastan bústað ella hevur starvast í Føroyum.

Millum Føroyar og hinar ríkisspartarnar eru reglurnar higartil framvegis galdandi, t.v.s. at ein føroyingur, dani ella grønlendingur hevur rætt til pensión, útroknað eftir reglunum í tí ríkisparti, viðkomandi býr.

Ásett verður, at full fólkapensión er treytað av fastum bústaði í ríkinum í minst 40 ár og at pensiónin fyri persónar, sum síðan fylla 15. árið hava havt fastan bústað í ríkinum í minni enn 40 ár, verður ásett í mun til, hvussu nógvar fjørtuindapartar viðkomandi hevur havt fastan bústað her.

Somuleiðis verður ásett, at full fyritíðarpensión er treytað av longdini av bústaðartíðini frá fylta 15. árinum til dagfestingina fyri tilflutan av pensión. Rætturin til fulla fyritíðar-pensión er treytaður av, at viðkomandi hevur búð 4/5 av árunum síðan fylla 15. árið í danska ríkinum. Lutfallið 4/5 er tað sama sum galdandi er fyri fólkapensionistar. Hjá fólkapensionistum er talan um 40 ár av 52 møguligum árum (67-15), t.v.s. 40/52 ella umleið 4/5.

Útrokningarbrøkurin fyri fyritíðarpensión og avlamisveiting sær sostatt soleiðis út:

faktisk bústaðartíð í mánaðum
4/5 av møguligari bústaðartíð í mánaðum

Fær ein pensionistur ikki fulla pensión í Føroyum, kann tað verða tí at frestandi fjørutiundapartarnir eru innvunnir í øðrum landi. Hugsast kann eisini, at ein føroyingur hevur búð í einum landi, sum sáttmáli ikki er gjørdur við, og at hann tey árini, hann hevur verið burturstaddur, ikki hevur vunnið sær pensiónsrættindi í viðkomandi landi. Í slíkum førum eigur at verða mett um, um viðkomandi skal hava eitt persónligt ískoyti til pensiónina upp til fulta pensión. Tá verður sostatt hugt uppá figgjarligu viðurskiftini (inntøku og ogn) hjá viðkomandi, til tess at meta um tað neyðuga í slíkum persónligum ískoyti.

Áðrenn pensiónin verður roknað eftir bústaðartíð (brøkpensión), verður hon roknað eftir inntøku útyvir pensiónina hjá pensionistinum og møguligum hjúnafelaga. Síðan verður pensiónin niðursett til talið av fjørutiundapørtum, sum pensionisturin hevur rætt til. Barnaviðbót eftir § 11 og persónlig viðbót eftir § 13, sum verða veittar til ein brøkpensionist, verða tó ikki niðursettar orsakað av bústaðartíð.

Ad § 17.

Tá bústaðartíðin í danska ríkinum skal gerast upp í sambandi við útrokning av pensión hjá teim, ið møguliga, orsakað av at tey hava búð í øðrum landi enn Føroyum, Grønlandi ella Danmark, ikki skulu hava fulla pensión, skulu eisini takast við tíðarskeið, har viðkomandi hevur verið uttanlands í tænastu fyri danska ríkið. Sum uppihald uttanlands í "almennum áhuga" kann t.d. nevnast starv í altjóða felagsskapum, sum ríkispartarnir eru limir í, starv sum tænastufólk hjá einum diplomati, lutøka í altjóða granskingarverkætlanum o.t.

Ad § 18.

Tað er einans bústaðartíðin í danska ríkinum frá fylta 15. árinum til fylta 67. árið, ið skulu roknast við í bústaðartíðina. Eru fleiri tíðarskeið, verða tey løgd saman. Hjá fólkapensionistum verður síðan lækkað til næsta heila talið av árum, meðan avrundað verður til næsta heila talið av mánaðum, tá tað snýr seg um fyritíðar pensionistar.

Ad § 19.

Pensiónin verður javnað eftir inntøku pensionistsins útyvir pensiónina. Tó verða full grunduppheedd hjá fólkapensionistum og full óarbeiðsføris- og fyritíðarviðbót til fyritíðarpensionistar, sum fáa pensión vegna avamni, veittar uttan mun til inntøku. Hjá pensionistum, ið fáa pensión vegna uppihaldaramiss (einkjur og einkjumenn), verður fyritíðarviðbótin tó javnað eftir inntøku.

Grunduppheddin hjá fyritíðarpensionistum verður somuleiðis javnað eftir inntøku pensionistsins útyvir pensiónina. Meðan grunduppheedd einans verður javnað eftir inntøkuni hjá pensionistinum sjálvum, verður pensiónsviðbótin javnað eftir inntøkuni hjá báðum hjúnafeløgum tilsamans, tá pensionisturin er giftur.

Ad § 20.

Grunduppheddin verður minkað við tí inntøku pensionisturin hevur útyvir pensiónina við 60% av inntøkuni t.v.s., at fyri hvørja krónu pensionisturin fær í inntøku útyvir pensiónina minkar grunduppheeddin við 60 oyrum. Tó verður ein frádráttur gjørdur í inntøkuni, áðrenn roknað verður, sí § 21, stk. 3 og § 30, stk. 1, nr. 6. Hjá pensionistum, ið fáa pensión vegna uppihaldaramiss, verður fyritíðarviðbótin minkað í framhaldi av minkingini av grunduppheddini, t.v.s. at ikki fyrr enn grunduppheddin er komin niður á 0, verður fyritíðarviðbótin minkað.

Pensiónsviðbótin verður lækkað við 30 % av inntøkugrundarlagnum. Hjá giftum pensionistum, tó við 15% av samlaða inntøkugrundarlagnum hjá báðum. Frádrátturin, ið verður gjørdur í inntøkuni, tá pensiónsviðbót verður roknað, er lægri enn tá grunduppheedd/fyritíðarviðbót verður roknað, sí § 21, stk. 5 og § 30, stk. 1, nr. 8.

Ad § 21.
Inntøkugrundarlagið fyri útrokning av pensión er útroknaða inntøkan við ávísum frádráttum, treytað av, hvør pensiónsupphædd og hvat inntøkuslag talan er um.

Inntøka skal skiljast sum lønar- og eftirlønarinntøka, samsýning, inntøka av sjálvstøðugum virki og landbúnaði, húsaleiguinntøka, virði av frium ágóðum, o.a.t. sambært skattauppgerðini, umframt avkast av fíggjarognum sambært ognaruppgerðini, og, har hesar ikki eru sentralt skrásettar, upplýsingum frá pensionistinum sjálvum.

Við í inntøkuna skulu ikki roknast sosialar pensiónir, hvørki fólka- ella fyrittíðarpensiónin sjálv, ella líknandi pensiónir í øðrum landi, sum sáttmáli er gjørdur við um pensión og sosialar veitingar. Eftirløn sambært løgtingslóg um arbeiðsmarknaðareftirlønargrunn, ið m.a. er ætlað sum eitt uppískoyti til fólkapensiónina, verður heldur ikki roknað við í inntøkugrundarlagnum.

Høvuðsreglan er, at pensiónin verður roknað eftir teirri inntøku, sum pensionisturin hevði sambært seinastu uppgerð og álíkning hjá skattavaldinum. Frá hesi inntøku verður frádráttur einans gjørdur fyri egið gjald til eftirløn smb. skattauppgerðini. Afturat inntøkuni verður løgd renta og annar vinningur - áðrenn frádrátt fyri rentuskatt - av føroyskum fíggarognum (innistandandi peningi í føroyskum peningastovnum, føroyskum lánsbrøvum, partabrøvum, v.m.) sambært upplýsingum frá pensionistinum og ognaruppgerðini fyri sama ár. Áðrenn rentuinntøka vm. verður løgd afturat inntøkuni smb. skattauppgerðini, verða rentuútreiðslur av lánum smb. ognaruppgerðini drignar frá. Inntøkan av fíggjarogn verður einans tikin við í inntøkugrundarlagið, um úrslitið er positivt, t.v.s. um inntøkurnar eru størri enn útreiðslurnar.

Inntøkur og ogn, sum verða skrásettar av Toll & Skattstovu Føroya í skattauppgerðini og ognaruppgerðini, kunnu heintast elektroniskt frá skráum skattavaldsins til pensiónsskrá Almannastovunar. Av tí at ikki øll fíggjarognarinntøka, ið skal takast við í inntøkugrundarlagið, er tøk í hesum skráum, verður pensionisturin í teim førum, har hetta er neyðugt, t.d. tá viðkomandi sambært ognaruppgerðini stendur at eiga fíggjarognir (lánsbrøv, partabrøv o.a.), ið geva avkast, biðin um at upplýsa um møguliga inntøku av hesum. Hetta í sambandi við umsóknina og árligu pensiónsásetanina.

Uttan mun til, um talan er um felags- ella serogn, koma hjúnafelagar at standa fyri hvør síni helvt av inntøkuni av fíggjarogn hjá báðum tilsamans.

Hevur pensionisturin ella hjúnafelagi hansara, í staðin fyri inntøku, eitt tíðarskeið í inntøkuárinum, ið nýtt verður, fingið fyribils hjálp eftir forsorgarlógini, skal henda roknast við í inntøkugrundarlagið. Hetta tó ikki, um undantaksreglan viðvíkjandi ásetan av inntøkugrundarlagnum verður nýtt, t.v.s. tá inntøkan er varandi broytt.

Undantaksvís kann inntøka av arbeiði ella eftirløn ásetast út frá væntaðari inntøku framyvir, og er hetta tá endauppgerðin ikki er nóg góð ímynd av veruligu inntøkuviðurskiftum pensionistsins tá ið hann fær tilluttað pensión. Gevst pensiónisturin við at arbeiða, ella fer hann niður í arbeiðstíð, etta fær pensionisturin eftirløn í staðin fyri vanliga løn, verður inntøkan broytt til ta væntaðu. Møguligar aðrar inntøkur, sum pensionisturin er skrásettur við í seinasta inntøkuuppgerð og ognaruppgerð, vera standandi óbroyttar, t.d. rentuinntøkur. Væntaða inntøkan verður nýtt, til samsvar er millum hesa og endauppgerðina.

Pensiónin verður, til samsvar er, umroknað við ársenda fyri at tryggja, at væntaða inntøkan svarar til veruligu inntøkuna sambært høskandi skjalprógv (afturhaldsskipan skattavaldsins, lønarseðlar e.a.t). Undantaksreglan verður vanliga nýtt við ásetan av nýggjum pensiónum við fyrst og næstkomandi ársumrokning, síðan skuldi samsvar verið ímillum enda- og fyribilsásetanina, um ikki talan er um framhaldandi skiftandi inntøkur. Tá verður umrokning gjørd á hvørjum ári, til inntøkan er støðug.

Undantaksreglan hevur við sær, at ein pensionistur í roynd og veru í eini skiftistíðarskeið kemur at verða roknaður við inntøkum frá tveimum ymiskum árum, næstseinasta ár fyri uppgjørdar inntøkur og ognarinntøkur og inniverandi ár fyri væntaðar inntøkur av arbeiði ella eftirløn.

Ikki øll inntøka pensionistsins skal tó ávirka pensiónsupphæddina. Frádráttur verður gjørdur við kr. 24.100 kr. í uppgjørdu inntøkuni, áðrenn grundupphæddin, og í leingjan av henni, fyritíðarviðbótin til einkjur og einkjumenn, verða roknaðar. Hevur fyritíðarpensionisturin inntøkur av arbeiði, verður ein eyka frádráttur gjørdur við kr. 14.900 aftrat. Hetta merkir, at ein fyritíðarpensionistur við arbeiðsinntøku kann forvinna til samans kr. 39.000 um árið, áðrenn grunduppheddin byrjar at minka. Arbeiðsinntøkur eru lønarinntøkur, inntøkur av sjálvstøðugum virki, nevndarsamsyningar o.l. Inntøka av útleigan verður ikki tikin við sum arbeiðsinntøka, uttan so at pensionisturin hevur virki, ið rekur útleigingarvirksemi burturav.

Tá pensiónsviðbótin verður roknað eftir inntøku, er frádrátturin minni. Hjá støkum pensionisti er hann kr. 12.100 árliga, meðan hann hjá hjúnum er kr 17.800 í inntøkugrundarlagnum tilsamans hjá báðum.

Tann soleiðis útroknaða inntøkan skal avrundast niðureftir til næsta talið, ið kann býtast við 100.

Ad § 22.
Pensiónin verður ásett einaferð um árið eftir inntøkugrundarlagnum, sum lýst omanfyri undir § 21.

Henda broytingar í persónligu støðu pensionistsins, herundir hjúnabandsstøðu (við giftu, sundurlesing, skilnað), bústøðu t.d. uppihald á stovni, uppihaldarastøðu (børn verða fødd, ella bliva 18 ár) verður pensiónin umroknað út frá nýggju støðuni.

Um so er at broytingar knappliga henda í arbeiðsinntøkuni hjá pensionistinum, sum hava við sær at inntøkan varandi broytist, kann pensiónin broytast mitt í árinum við grundarlag í væntaðu inntøkuni. Sum treyt fyri broyting av inntøkugrundarlagnum hjá sjálvstøðugum vinnurekandi er, at viðkomandi fyrst skal boða Toll- og Skattstovu Føroya frá hesum.

Hjá pensionistum, sum hava skiftandi og óvissar lønarinntøkur, er møguleiki fyri at áseta pensiónina við styttri millumbilum, um vanligt er við grundarlag í upplýsingum frá Toll- og Skattstovu Føroya. Soleiðis kann Almannastovan avgera, at útrokna pensiónina kvartalsvís ella hálvárliga, um mett verður, at hetta í størri mun tryggjar, at pensionisturin fær tað rættu upphæddina beinanvegin.

Tann soleiðis av nýggjum ásetta inntøkan verður eftirroknað við næstkomandi ársumrokning, eftir at veruliga inntøkan er fingin til vega. Møguligt ov lítið ella ov nógv útgoldið, sum vísur seg við eftirrokningina, verður útgoldið ella kravt aftur.

Ad § 23-24.
Álagt verður pensionistum at boða frá einihvørji broyting í persónligu viðurskiftunum, ið kunnu hava við sær, at pensiónin skal minka ella detta burtur. Tílík viðurskifti eru t.d., at viðkomandi verður giftur, og at arbeiðs- ella onnur inntøka hækkar.

Boðar pensionisturin ikki frá tílíkum broytingum, og fær tí veiting av órøttum, hevur tað við sær, at tann upphædd, ið er ov nógv útgoldin, skal gjaldast aftur. Sigur pensionisturin seg ikki verða føran fyri at gjalda aftur beinanvegin, og góðtekur Almannastovan hetta aftaná at hava mett um fíggjarligu støðu hansara, stendur kravið við, um neyðugt til búgv hansara verður skift við deyða.

Ad § 25.
Um so er, at munandi broytingar henda í viðurskiftunum hjá einum pensionisti, sum hava týdning við atliti til rættin til ta fyritíðarpensión, sum er tilfulað viðkomandi, skal málið takast upp til nýggja viðgerð og døm-

ing. "Munandi" broytingar skulu skiljast sum broytingar, ið kunnu hava við sær, at pensiónin, grundað á aktuellu støðuna hjá viðkomandi, møguliga vildi hækka, lækka ella dottin burtur, um ein nýggj meting varð gjørd.

Tó er tað soleiðis, tá ein pensionistur er vorðin 60 ár, kunnu ongar broytingar gerast, hvørki lækking hækking ella afturtøka av pensión.

Ein fyritíðarpensionistur, ið fær pensión grundað á uppihaldaraniss (einkja, einkjumaður) missir pensiónina, um viðkomandi giftist uppaftur.

Ad § 26.
Tað er Almannastovan, sum skal ansa eftir, um broytingar fara fram í persónligu viðurskiftum pensionistsins, sum kunnu hava við sær, at pensiónin møguliga skal broytast ella takast aftur. Almannastovan skal taka nýggja avgerð um pensiónina, tá tað snýr seg um pensiónir. Almannastovan sjálv hevur tikið avgerð um sambært hesi lóg, meðan Almannastovan skal reisa mál fyri Vanlukkutryggingarráðið, tá tað snýr seg um pensión grundað á avlamál, sum ráðið tekur avgerð um sambært hesi lóg.

Ítøkiliga skal Almannastovan reisa mál fyri Vanlukkutryggingarráðið, tá inntøka pensionistsins útyvir pensiónina fer uppum ávíst mark, tá arbeiðsførið hjá einum fyritíðarpensionisti er tyðandi betrað ella versnað ella, tá støðan hjá einum persóni, ið hevur fingið tilkennað avlamisveiting ella røktar-/hjálparviðbót, er batnað so mikið, at roknast má við, at viðkomandi ikki longur lykur treytirnar fyri hesi veiting/viðbót.

Spurningar viðvíkjandi broytingum í pensión, veiting ella viðbót kunnu eisini til eina hvørja tíð reisast av persóninum sjálvum.

Ad § 27-28.
Tá ein fyritíðarpensionistur verður 67 ár, skiftir hann frá fyritíðarpensión til fólkapensión. Hevur hann frammanundan havt rætt til hjálpar- ella røktarviðbót, sum annars ikki verða veittar til fólkapensionistar, varðveitir hann hesar viðbøtur. Skiftið frá fyritíðarpensión til fólkapensión krevur ikki, at nýggj umsókn verður latin inn. Skiftið fer fram frá 1. í mánaðinum aftaná fylta 67. árið.

Rætturin til pensión og viðbøtur heldur uppat við endan av tí mánaði móttakarin doyr. Tó hevur hjúnafelagin hjá einum giftum pensionisti, um viðkomandi eisini er pensionistur, rætt til at fáa pensiónina hjúnafelagans í 3 mánaðar frá endan av tí mánaði, pensionisturin doyr. Møgulig persónlig viðbót verður somuleiðis útgoldin hjúnafelagnum. Hjálpar- og røktarviðbót fella tó burtur við endan av tí mánaði móttakarin doyr. Fekk pensionsturin barnaviðbót, fellur hendan burtur. Hjúnafelagin ella annar persónur, ið hevur uppihaldsskyldu mótvegis sama barni, hevur í staðin rætt til at fáa barnagjald eftir 2. parti í lóg um barnagjald til einsamallar uppihaldarar. Henda veiting kemur framum barnaviðbótina, tí barnaviðbótin verður einans útgoldin, um treytirnar fyri at fáa barnagjald ikki eru til staðar.

Ad § 29.
Tá ein pensionistur fær uppihald á serforsorgarstovni, á ellis- og røktarheimi, sjúkrahúsi e.a., herundir eisini á donskum samsvarandi stovni, har viðkomandi fær hjálp ella røkt, dettur røktar- ella hjálparviðbót burtur við endan av tí mánaði, ið kemur aftaná mánaðin, viðkomandi fær uppihald á stovninum ella verður innlagdur á sjúkrahús. Hetta er eisini galdandi, um viðkomandi verður settur í røkt í privatum heimi undir eftirliti av einum almennum ella alment góðkendum stovni, ella um hjálparfyriskipan verður sett í verk av Almannastovuni, ið hevur sama endamál, sum røktar- ella hjálparviðbótin.

Pensiónin dettur burtur aftaná 6 mánaðir hjá einum pensiónisti, sum situr dóm av.

Reglur um hvussu annars verður við pensiónini, tá pensionistar fáa uppihald á ovannfyri nevndu stovnum, sjúkrahúsum vm. og um evt. gjald fyri stovnsuppihaldið, verða ásettar í serligari løgtingslóg, ið skal fáa gildi samstundis sum henda lóg um sosialar pensiónir kemur í gildi.

Ad § 30.
Upphæddirnar sum ásettar eru í lógini, eru savnaðar í hesi grein. Pensiónsupphæddirnar eru legri, tá bæði hjúnini fáa pensión. Burtursæð frá minstu útgjaldsupphæddini sambært stk. 1, nr. 5, eru upphæddirnar tær somu sum í fyrrverandi lógini. Minsta útgjaldsupphæddin eftir hesi lóg, 1/40 av grundupphæddini (t.d. svarar til 949 kr árliga til giftan pensionist í staðin fyri kr. 6.328 eftir fyrrverandi reglum). Hetta er gjørt sum tilaging til innvinningarreglurnar, sum áseta, at pensiónin verður útgoldin í fjørutiundapartum, tá viðkomandi ikki lykur bústaðartreytirnar fyri fullari pensiónsupphædd (40 ár fyri fólkapensión og 4/5 av møguligari bústaðartíð fyri aðrar).

Ásett verður, at ein giftur persónur verður javnsettur við ein stakan, tá samlívið við hjúnafelagan er slitið. At samlívið er slitið vil siga, at hjúnini ikki longur hava felags húsarhald. Tá tann eini av hjúnafeløgunum fær uppihald á einum stovni sambært § 29, herundir eisini eldrasamhýli, verður pensiónin rokuað sum til ein stakan pensionist hjá báðum hjúnafeløgunum. Verður samlívið slitið við sundurlesing er sama regla galdandi. Reglan er annars galdandi fyri giftan pensionist, sum, uttan at verða sundurlitsin ella skildur, hevur sín egna bústað og ikki gjøgnum kontantan pening, arbeiði í heiminum ella á annan hátt, hevur felags húsarhald við hjúnafelagan.

Pensiónsupphæddirnar verða javnaðar eftir reglum, ið ásettar verða í serligari løgtingslóg.

Ad § 31.
Í greinini verður staðfest, at veitingar eftir lógini einans verða latnar eftir umsókn, at serligt umsóknarblað skal nýtast, og at umsøkjarin skal leggja við tey skjalprógv, sum neyðug eru fyri at avgerð kann takast.

Tá tað snýr seg um umsóknir um avlamistreytaða fyritíðarpensión, skulu umsóknirnar latast inn til Almannastovuna. Almannastovan hevur eftir forsorgarlógini skyldu til at veita øllum, sum tørva tað, ráðgeving og leiðbeining í persónligum og forsorgarligum spurningum. Hjá einum persóni, ið er komin í ta støðu, at umsókn um fyritíðarpensión er komin uppá tal, er tað av týdningi, at fáa ráðgeving, herundir um aðrar møguleikar enn pensión. Tað er Almannastovan, sum kannar møguleikarnar fyri og tekur avgerðir um iverksetan av endurbúgvandi tiltøkum. Fyritreytin fyri tillutan av pensión er, at allir møguleikar at útvega hóskandi arbeiði ella at hjálpa til endurskapan av arbeiðsførinum eru royndir frammanundan. Fyri at tryggja, at støða er tikin til hesar spurningar, umframt møguliga aðrar persónligar ella forsorgarligar spurningar, verður ásett, at Almannastovan skal gera sína tilráðing um pensión í tí einstaka málinum. Samstundis verður álagt Almannastovuni at syrgja fyri, at allir upplýsingar, sum eru neyðug hjá Ráðnum at hava, áðrenn støða kann takast til pensiónsum-sóknina, eru við umsóknini.

Tað kann koma fyri, at ein persónur ikki ynskir at søkja pensión ella aðra veiting eftir hesi lóg, hóast greitt er, at aðrir møguleikar ikki eru hjá viðkomandi at klára seg framyvir. Um so er, kann Almannastovan reisa mál um pensiónstillutan. Hetta kann t.d. koma fyri, tá viðkomandi leingi hevur livað av fyribils hjálp eftir forsorgarlógini, og mett verður, at endurbúgvingartiltøk eru úrslitaleys. Tað kann eisini koma fyri, tá viðkomandi persónur, t.d. orsakað av sálarligari sjúku, ikki verður mettur at vera førur fyri sjálvur at taka eina slíka avgerð.

Ad § 32.
Ásett verður, at Almannastovan og Vanlukkutryggingarráðið kunnu krevja at fáa upplýsingar, ið hava týdning fyri viðgerðina av einum pensiónsmáli, frá einumlívørjum myndugleika, ið hevur kunnleika til viðurskifti av týdningi fyri viðgerðina. Ein almennur myndugleiki kann ikki nokta at útflýggja tílíkar upplýsingar.

Ad § 33.
Fyritíðarpensión verður veitt frá tí degi, sum er uppgivin í avgerðini hjá Vanlukkutryggingarráðnum ella Den Sociale Ankestyrelse (avgerðir, ið eru kærdar). Pensión annars, t.v.s. har Almannastovan tekur avgerðina, verður veitt frá tí degi, treytirnar eru loknar, tó í fyrsta lagi frá 1. í mánaðinum aftaná, at umsóknin er móttikin á Almannastovuni.

Ad § 34.
Í nógvum førum er tað soleiðis, at ein persónur, sum søkir fyritíðarpensión, frammanundan hevur fingið fíggjarligan stuðul eftir forsorgarlógini. Hesin stuðul kann bæði verða framhaldandi fíggjarlig hjálp til uppihalds og hjálp til stakútreiðslur, herímillum møguliga eisini hjálp til at sanera skuld við, við tí endamáli, at gera viðkomandi føran fyri at klára seg. Tá tað snýr seg um ein persón, sum er soleiðis staddur, at søkt verður um fyritíðarpensión, verður við hjálpini roynt at gera tillagingar til eina støðu sum pensionistur. Hjálpin verður líðandi tillaga veitingarstøðinum, roknað verður við, at viðkomandi kemur at fáa.

Tá henda tillaging er at enda komin, t.v.s. tá mett verður, at viðkomandi nú er førur fyri at klára seg á tí metta fyritíðarpensiónsstøðinum, og viðkomandi einans bíður eftir eini pensiónsavgerð, er umsitingarliga lættari beinanvegin at fara yvir til at veita viðkomandi eina pensión. Neyðugt er ikki - sum tá talan er um forsorgarveitingar - at taka málið uppaftur við stuttum millumbilum. Umsitingin kann automatiserast beinanvegin við forskotsveitan av pensión.

Reglan skal ikki nýtast, men kann nýtast, tá tað frammanundan er ríkiliga greitt, hvat úrslitið av pensiónsumsóknini verður, og tá neyðugar fyrireikingar eru gjørdar til, at pensiónisturin klárar seg við hesi veiting.

Forskotið verður veitt við teirri upphædd, roknað verður við, at viðkomandi kemur at fáa í pensión.

Skuldi tað komið fyri, at viðkomandi kom at fáa eina lægri pensiónsupphædd, enn roknað varð við frammanundan, verður munurin umkonteraður sum hjálp uttan afturgjaldsskyldu sambært forsorgarlógini.

Ad § 35.
Pensión verður útgoldin frammanundan eina ferð um mánaðin.

Álagt verður pensionistum at boða Almannastovuni frá, tá hann skiftir bústað og upplýsa um nýggja bústaðin.

Landsstýrismaðurin skal í samráð við donsku stjórnina áseta reglur um, hvørja pensión ein pensionistur, sum hevur fingið tilfatað pensión í Danmark, skal fáa í Føroyum, tá hann flytir til Føroya. Hinvegin gera donsku myndugleikarnir reglur um, hvørja pensión ein pensionistur, sum flytir úr Føroyum til Danmarkar, skal fáa har. Hetta eru spurningar, sum verða tiknir upp við Almannamálaráðið so skjótt sum henda lógin er samtykt, soleiðis at hesin spurningur er avgreiddur, tá lógin fær gildi.

Ad § 36.
Í greinini verður ásett, at Almannastovan kann umsita pensiónina hjá einum persóni, tá hon gerst varug við, at viðkomandi ikki sjálvur er førur fyri at umsita pensiónina. Hetta kann koma fyri, tá ein pensionistur endurtakandi ferðir hevur brúkt pensiónina upp, áðrenn mánaðin er av, ella tá ið tað hevur verið neyðugt at veita viðkomandi fskoyti til yvirlívilsi restina av mánaðinum, ella tá ið tað hevur verið neyðugt at veita eyka hjálp at gjalda útreiðslur til hita, ljós. Um so er, at pensionistur sálarliga ella á annan hátt er so illa fyri, at mett verður, at viðkomandi als ikki er førur fyri at hava ábyrgdina fyri sær sjálvum, kann Almannastovan reisa mál um ómyndiggeran.

Ad § 37.
Reglan um beinleiðis flyting av limagjaldinum verður nýtt, tá ein pensiónistur ikki heldur sínar gjaldsskyldur mótvegis sjúkrakassanum.

Ad § 38.
Krøv um veitingar eftir hesi lóg kunnu ikki gerast til mál fyri útinøku ella aðrari rættarsókn.

Er talan um, at ein pensionistur hevur givið upp skeivar upplýsingar ella hevur latið vera við at geva upp-

lýsingar, sum hann hevur skyldu at boða frá, og hann av hesi grund hevur fingið ov stóra veiting, kann krav um tað ov nógv útgoldna gerast í pensiónini.

Pensión til giftar persónar er lægri, tí bæði fáa pensión enn tá bert annar av hjúnafeløgum fær pensión. Viðgerðin av eini pensiónsumsókn kann taka langa tíð - fleiri mánaðir, enntá ár, tá talan er um avlamisgrundaða pensión. Pensiónin verður tí tillutað frá einum degi, sum er langt afturi í tíðini og verður eftirgjald tí útgoldið fyri tíðina, sum farin er. Í tíðarskeiðnum, sum gongur frá umsókn til avgerð um pensión til ein hjúnafelaga hjá einum pensionisti, fær pensionisturin útgoldið eina veiting svarandi til hana ein pensionistur, ið er giftur við ikki-pensionisti, fær. Fekk hjúnafelagin pensión beinanvegin - uttan ta longu viðgerðartíðina - varð pensiónin hjá báðum veitt eftir reglunum beinanvegin. Við tað at vantandi samsvar er millum tillutanardag og útgjaldsdag hevur pensionisturin í roynd og veru fingið eina pensión, ið er hægri enn hann vildi havt fingið, um tíðarsamsvar var.

Í greinini verður tí ásett, at tað, sum av omanfyri nevndu orsøk er ov nóg útgoldið, kann verða mótroknað í teirri pensión, sum hjúnafelagin fær útgoldnað fyri sama tíðarskeiðið.

Ad § 39.
Vanlukkutryggingarráðið tekur avgerð um tillutan, broyting og afturtøku av fyritíðarpensjón, hjálparviðbót, røktarviðbót og avlamisveiting.

Ráðið er sett saman av Sorinskrivarinum (dómarinum) sum er formaður, landslæknanum og 4 limum valdir av løgtinginum fyri 4 ár ísenn. Tá ið ráðið hevur tikið avgerð í einum máli, verður tað sent Almannastovuni til avgreiðslu. Nevnast skal eisini her. at um ráðið metur at viðkomandi ikki lykur treytirnar fyri at fáa fyritíðarpensión, so kann ráðið viðmæla landstýrismanninum í almannamálum at umsøkjarin fær framskundaða fólkapensión, og so er tað landstýrismaðurin sum avgerð, um umsóknin skal gangast á møtið.

Greinin ásetur eisini ymisk krøv, sum Vanlukkutryggingarráðið kann seta umsøkjarinum, t.d. at møta í ráðnum fyri at geva frágreiðing, at lata seg viðgera av lækna, innleggja til kanningar og viðgerð ella eisini lata málið falla burtur um umsøkjarin ikki virkar við í neyðugum kanningum, uppvenjing ella øðrum fyriskipanum, sum ætlast at hava við sær munandi betran av arbeiðsførinum.

Ad § 40.
Fyri virksemið hjá Vanlukkutryggingarráðnum ásetur landsstýrismaðurin í almannamálum nærri reglur. Ráðslimirnir fáa eina samsyning og útreiðslurnar av virkseminum hjá ráðnum verða goldnar av landskassanum, meðan útreiðslurnar av viðgerðini hjá Den Sociale Ankestyrelse verða goldnar av statinum.

Ráðið skal gjalda fyri møguligan ferðakostnað fyri at møta í ráðnum, og tann partin av útreiðslum til viðgerð sum ikki verður goldin av sjúkrakassanum, umframt læknaváttanir sum ráðið hevur umbiðið.

Ad §§ 41-42
Avgerðir, sum Almannastovan hevur tikið sambært hesi lóg, kunnu kærast til Kærunevndina í almannamálum

Avgerðir, sum Vanlukkutryggingarráðið hevur tikið sambært hesi lóg, kunnu kærast til Den Sociale Ankestyrelse.

Ad §§ 43-49
Ásett er, at lógin skal koma í gildi frá 1. januar 1999.
Samstundis fara úr gildi galdandi fólka-, avlamispensiónslóg, §§ 27 — 31 í lógini um almenna forsorg og løgtingslóg um uppískoytisveiting til einkjur.

Í § 44 er ásett, at persónar, sum áðrenn 1. januar 1999 høvdu rætt til hægsta, miðal og lægstu avlamispensión, hava framyvir rætt til fyritíðarpensiónir eftir hesi lóg.

Eisini teir persónar, sum høvdu rætt til avlamisveiting og hjálpar- og røktarviðbót áðrenn 1. januar 1999 fáa hesar veitingar eftir hesi lóg.

Kvinnur, sum áðrenn 1. januar 1999 høvdu rætt til einkjupensión, hava framyvir rætt til miðal fyritíðarpensión eftir hesi lóg og kvinnur, sum høvdu rætt til veiting eftir § 27, stk. 2 í forsorgarlógini, t.v.s. kvinnur yvir 50 ár vegna ringa heilsu ella annað, hava framyvir rætt til lægstu fyritíðarpensión eftir hesi lóg.

Persónar, sum áðrenn 1. januar 1999 høvdu rætt til fólkapensión, tí teir vórðu yvir 67 ár, hava framyvir rætt til fólkapensión eftir hesi lóg.

Persónar, sum áðrenn 1. januar 1999 høvdu rætt til fólkapensión, av øðrum grundum enn aldur, hava rætt til lægstu fyritíðarpensión eftir hesi lóg.

Persónar sum áðrenn 1. januar 1999 høvdu rætt til bíðiviðbót, aldursviðbót og avlamisskoyti, varðveita hesi við teim upphæddum, sum ásettar eru í §§ 46, 47 og 48.

Persónar, sum áðrenn 1. januar 1999 bert høvdu rætt til _ avlamisviðbót, tí viðkomandi hevði ov høga inntøku til at fáa lægstu avlamispensión, varveita hesa viðbót, um teir ikki eftir nýggju reglunum hava rætt til grundupphædd og pensiónsviðbót við í minsta lagi somu upphædd.
+ skjøl.

Skjal nr.1

SØGULIG LÝSING
LÝSING AV BROYTINGUNUM Í PENSIÓNSLÓGUNUM SÍÐAN 1948

Við útgangsstøði í almennu viðmerkingunum til lógaruppskot síðan 1949 er niðanfyri gjørd ein stutt lýsing av upprunanum til galdandi lógir og søguligu gongdini, hvat broytingum viðvíkur. Greitt verður einans frá teim lógarbroytingum, sum hava verið umfatandi og prinsippiellar.

Eitt høvuðsendamál við broytingum, sum eru framdar í pensiónslógunum gjøgnum árini, hevur verið at tillaga føroysku veitingarsløgini, veitingarstøðið og treytirnar fyri tilhutan av pensión til donsku ásetingarnar hesum viðvíkjandi, har danska lógin alla tíðina er broytt nøkur ár framman undan hini føroysku. Eisini aftaná 1975, tá fyrisitingin varð yvirtikin, hevur ein høvuðsgrundgeving fyri broytingum verið at skapa samsvar millum tíkispartarnar. Seinast í 1988, hóast langt var ímillum broytingar av stórvegis týdningi í 70- og 80-árunum.

Lógarbroytingarnar í 1970 eru tó eitt undantak í mun til sínámillum tillagingina, tí tá verða samanberingar gjørdar við lønarlagið í hvørjum landi sær. Niðurstøðan bleiv, at veitingarnar í Føroyum ikki skuldu hækka samsvarandi hækkingunum í Danmark, tí lutfallið millum lønir og pensión var ongleið tað sama í báðum ríkispørtunum uttan broyting (umleið 48%). Av viðmerkingunum til lógaruppskotini sæst ikki, at tílíkar samanumetingar hava verið gjørdar fyrr, heldur ikki seinni.

Meðan donsku pensiónsreglurnar hava verið fyri grundleggjandi endurskoðan í øllum førum nakrar ferðir, er hetta ikki hent í Føroyum. Í lógunum fyri Føroyar eru partar av donsku broytingunum tíknur við, meðan aðrir partar ikki eru tað. Úrslitið er, at trupult er at skilja samanhang í lógunum og endamál við nógvum av ásetingunum í galdandi lógum.

Ellis- og avlamisrenta
Galdandi fólkapensiónslóg hevur sín uppruna í fólkapensiónslógini frá 1959, sum avloysti lógina um ellisrentu frá 1949.

Ovara aldursmarkið fyri at fáa ellisrentu var 60 ár fram til 1949. Aldursrentuupphæddin var í trimum stigum, helt at og hækkandi við tilgangsaldrinum 60, 65 ella 70 ár, og varð rentan útgoldin hvønn ársfjórðing.

Frádráttur varð gjørdur í rentuni fyri inntøkur yvir ávísa avmarkaða upphædd, sum móttakarin hevði framíhjá, og fall rentan burtur, tá inntøkan útyvir rentina, ognarinntøka íroknað, fór uppum eitt ásett mark. Frádratturin í rentuni fyri inntøkur var í trimum stigum eftir inntøkustøddi við ávikavíst 60, 72 og 84 prosentum.

Rentumóttakarar høvdu rætt til ókeypis læknahjálp, heilivág, sjúkrahúsviðgerð o.a., í tann mun hesar útreiðslur ikki komu undir stuðul sambært reglunum hjá sjúkrakassanum; harumframt var møguligt at søkja um persónligt fskoyti til ellisrentuna, sum kundi játtast, um mett varð í tí einstaka málinum, at støðan hjá viðkomandi var sera trupul móttakarar høvdu rætt til ókeypis læknahjálp, heilivág, sjúkrahúsviðgerð o.a., í tann mun hesar útreiðslur ikki komu undir stuðul sambært reglunum hjá sjúkrakassanum; harumframmt var møguligt at søkja um persónligt fskoyti til ellisrentuna, sum kundi játtast, um mett varð í tí einstaka málinum, at støðan hjá viðkomandi var sera trupul.

Avlamispensiónslógin hevur sín uppruna í avlamispensiónslógini frá 1961, sum avloysti avlamistryggingarlógina, ið, eins og lógin um ellisrentu, var fyrt umfatandi broytingum í 1949.

Treytin fyri at fáa avlamisrentu var limaskapur í avlamistryggingini, sum var tvungin fyri njótandi limir av statsgóðkendu sjúkrakassunum og sjálvboðin fyri gjaldandi limir og fyri limir av statskontrolleraðu sjúkratryggingini. Avlamispremia varð kravd inn av sjúkrakassunum saman við sjúkrakassalimagjaldinum.

Fyri at gerast limur í sjúkratryggingini, skuldi viðkomandi lúka heilsutreytirnar, t.v.s. ikki hava alfurvendandi og ólekiligar sjúkur og brek. Hjá teimum sum, orsakað av heilsutreytunum, ikki kundu gerast limir, var fátækrahjálp einasti útvegur í neyðstøðu.

Treytin fyri at fáa avlamisrentu var, at vinnuførleikin var skerdur niður í ein triðing. Avlamisrentan var ein lægri upphædd enn hægsta ellisrenta (svarandi til tilgangsaldurin 70 ár), tó hægri enn miðal ellisrenta við 65 ára tilgangsaldri. Eitt hjálparloysisískoyti kundi játtast, tá viðkomandi hevði tørv á støðugari røkt og hjáveru.

Eisini í avlamisrentuni varð gjørdur ein frádráttur fyri inntøkur, sum rentumóttakarin hevði útyvir rentuna, tó soleiðis, at rentan ikki kundi lækka meira enn niður í ein triðing.

Avlamisrentumóttakarar høvdu, eins og móttakarar av ellisrentu, rætt til ókeypis læknahjálp, heilivág, sjúkrahúsviðgerð o.t., og høvdu harumframt rætt til hjálp til fyribyrgjandi heilsufyriskipanir (t.d. venjing í brúki av bandagum, røkt og viðgerð, o.t.). Persónligt ískoyti, eftir meting av fíggjarligu viðurskiftunum í tí einstaka førinum, kundi somuleiðis veitast til avlamisrentuna.

Umframt at lúka treytirnar viðvíkjandi limaskapi, aldri, skerdum vinnuførleika, heimarætti og bústaði, var játtan av ellis- og avlamisrentu treytað av, at viðkomandi leyk sonevndu tignartreytirnar ("værdighedsbetingelserne"). Tað vildi til dømis siga, at umsøkjarin

- "de seneste 10 år ikke har forringet sin økonomiske stilling ved handlinger til fordel for børn...eller ved uordentligt og ødselt levned",
- "de sidste 5 år vitterligt ikke har ført et levned, der i det almindelige omdømme vækker forargelse", ella
- "de sidste 3 år ikke har oppebåret hjælp, der ifølge fattiglovgivningens regler har fattighjælps virkning".

Rættaravleiðingin av fátækrahjálp kundi m.a. vera tap av valrætti, hjúnabandsforboð, afturrindan av móttiknari hjálp o.a.

Kommunustýrini gjørdu tilráðing um ellisrentuna og høvdu eftirlit við og váttaðu, um treytirnar fyri fram-

haldandi rentu vóru tilstaðar. Amtmaðurin/ríkisumboðsmaðurin tók avgerð, útroknaði veitingina og metti, um umsókn um persónligt ískoyti til pensiónina skuldi játtast.

Áheitan um avlamisrentu varð innlatin til kommunustýrið, sum sendi áheitanina, saman við váttan frá sjúkrakassa og læknaváttan, viðari til sorinskrivaran, sum hevði skyldu at ansa eftir, at sjúkrakassaviðurskifti vóru í lagi og tignartreytirnar loknar. Vanlukkutryggingarráðið metti og tók avgerð, um vinnuførleikin var niðursettur til 1/3 og um óhjálpni fyrilá. Við hesum og øðrum upplýsingum sum grundarlag varð rentan umsitin av amtinum.

Í 1949 vórðu, sum sagt, týðandi ábøtur framdar í lógunum og eru hesar upprunin til tu pensiónsskipan, vit kenna í dag. Ellis- og avlamisrenturnar hækkaðu munandi, og reglurnar um frádrátt fyri inntøkur vórðu gjørdar lagaligari.

Avlamisrentan varð upprunaliga inntøkujavnað á sama hátt sum ellisrentan. Í 1949 vórðu frávik gjørd í sambond við frádrátt í avlamisrentuni fyri inntøkur. Ongin hækking skuldi gerast í inntøkugrundarlagnum fyri ognarinntøkur, og loyvt var at hava eina arbeiðsinntøku, sum svaraði til útgoldnu rentuupphæddina, áðrenn frádráttur varð gjørdur. Var móttakarin giftur, varð einans helvtin av inntøkuni tikin við í útrokningar-grundarlagið.

Bæði rentusløgini fingu felags grunduppheedd, avlamisískoyti varð lagt aftrat avlamisrentuni sum endurbót fyri serligar útreiðslur av avlamni, og allir rentumóttakaar, ið høvdu børn undir 18 ár, fingu eina barnaviðbót aftrat rentuni. Avlamisískoyti og barnaviðbót vórðu somuleiðis lækkað eftir inntøku við síðuna av pensiónini.

Ellisrentualdurin varð hækkaður frá 60 til 65 ár, fyri einsamallar kvinnur tó 62 ár. Sum endurbót við uppseting av ellisrentu til hægri aldur (67 ella 70), varð veitt ein bíðiviðbót.

Broyting varð gjørd í reglunum um avlamisrentu, soleiðis at børn undir 15 ár og ung millum 15 og 18 ár, ið, orsakað av heilsutreytunum, ikki kundu gerast limir í sjúkrakassa, kundi fáa stuðul til avlamisfyribyrgjandi fyriskipanir.

Rentan fall burtur, og lummapeningur varð í staðin útgoldin til persónar, sum høvdu uppihald á ellisheimi.

Útgoldið varð annanhvønn mánaða í staðin fyri hvønn ársfjórðing.

Landsstýrið kom í 1949 við í fyrisitingina. Leiðbeinandi ætningslinjur fyri inntøkuútroknингina, serliga viðvíkjandi naturaliuinntøkum, skuldu gerast av ríkisumboðnum í samráð við landsstýrið. Avgerðir í tí einstaka málinum um persónligt ískoyti til pensiónina, umframt meira fastar reglur fyri játtan av persónligum ískoyti, skuldu gerast í samráð við landsstýrið.

Broytingarnar í 1949 høvdu við sær eina ferfaldan av samlaðu útreiðslunum til ellis- og avlamisrentur, sum vórðu fíggjaðar við helvtarbýti millum statin og heimastýrið. Avlamisrentan varð tó partvís fíggjað av inngoldnu premiunum (umleið 1/3).

Frá rentu til pensión í 1959

Í 1959 varð fólkapensiónslógin sett í gildi, og ellisrentun avskaffað. Samstundis fær avlamisrentan pensiónsheitið, hóast talan framvegis er um trygging, í og við at hon framhaldandi partvís verður fíggjað við premiuinngjøldum.

Minstaupphæddin (folkepensionens mindstebeløb) lýsir prinsippiella umskifti frá eini "tørvspensión", t.v.s. eini inntøkuheftari veiting, til eina rættarbundna fólkaveiting til øll yvir 67 ár, uttan mun til fíggjarlig viðurskifti.

Aftrat prinsippiella umskiftinum verða, umframt aðrar broytingar av minni týdningi, stórar hækkingar gjørdar í upphæddum, aldursviðbót til pensionistar yvir 80 ár verður innført, frádráttarreglurnar viðvíkjandi inntøkujavningini verða gjørdar lagaligari, aldursmarkið fyri fólkapensión verður hækkað til 67 ár, pensiónin verður útgoldin hvønn mánaða, og automatisk prístalsjavning av pensiónsveitingunum verður sett í gildi.

Talan var um sera stórar og dýrar ábøtur. T.d. varð avlamisrentan hækkað við umleið 85 prosentum. Fíggjarligu avleiðingarnar vóru nærum ein tvífaldan av samlaðu útreiðslunum til rentur og pensión. Tí varð eitt tvungið fólkapensiónsgjald uppá 1 prosent av skattskyldugu inntøkuni innført fyri luvíst at fíggja meirkostnaðin av nyskipanini, og vórðu broytingarnar framdar í 3 stigum fram til 1. apríl 1961.

Avtøka av tignartreytunum, broytt avlamishugtak o.a. í 1961

Í 1961 vórðu tignartreytirnar settar úr gildi. Reglan um, at umsøkjarin ikki tey seinastu 10 árini skuldi hava verrað sína fíggjarligu støðu við burturgeving, oyðslutum ella óryggisligum levnað, varð tó broytt, soleiðis at slíkur atburður ikki longur forðar fyri at fáa pensión, men skuldi takast við í útrokningini av pensiónini í staðin, sum um viðkomandi framvegis átti ta upphædd, hann hevði "formøblað". Henda reglan er framvegis í gildi.

Fólkapensiónsrætturin varð víðkaður til, umframt einsamallar kvinnur, eisini at umfata kvinnur, sum vóru giftar við pensionistum, frá 62 ára aldri. Harumframt kundi framskundað fólkapensión játtast frá 60 ára aldri, um heilsuviðurskifti ella aðrar serligar umstøður talaðu fyri tí.

Treytin fyri avlamispensión varð broytt. Arbeiðsførið skuldi vera niðursett varandi, áðrenn pensión kundi játtast. Fyritreytin fyri játtan av pensión var, at vinnuførið ikki kundi betrast við íverksetan av uppvenjingar- og útbúgvingartyriskipanum. Fyri at fremja hetta, bleiv tilskot latið til rakstur av endurbúgvingartyriskipanum, og ráðnum verður heimilað at taka pensiónsrættin aftur, tá vinnuførið var ella kundi betrast.

Avlamisstuðul varð víðkaður útum tað, sum hevði beinleiðis týdning við atliti til vinnu. Stuðul kundi latast fyri at lætta um gerandisdagin sum heild hjá avlatunum. Heimild ráðsins at játta stuðul til hjálpartól (hoyritól o.t.) varð víðkað samsvarandi hesum, og húslig hjálparviðbót varð innført. Umframt hetta kundi avlamisveiting játtast til persónar, sum læknaliga mett uppfyltu treytirnar fyrt pensión, men tó høvdu so mikið stóra inntøku, at pensión ikki kundi játtast.

Hjálparloysisfskoytið varð avloyst av hjálparviðbót og røktarviðbót, sum innibar eina graduering av stuðlinum eftir, hvussu umfatandi hjálpartørvurin var.

Avlamispremiugjaldið varð avskaffað við lógarbroytingunum í 1961. Hereftir skuldi 1/2 av fólkapensiónsgjaldinum roknast sum avlamispensiónsgjald. Samstundis varð krav um limaskap í sjúkratrygging avskaffað, og reglan um, at persónar við aftanvendandi og ólekiligum sjúkum ikki kundu avlanistryggjast, sett úr gildi.

Ásettar vórðu reglur fyri avsetan av eini upphædd til stovnssetan av ellis- og røktarheimum, og fast inntøkuheft gjøld ásett fyri uppihald á stovnum hjá persónum, sum høvdu aðra inntøku enn pensiónina.

Av nyskipanum annars í 1961 kunnu nevnast:

- at pensión kundi veitast pensionistum, sum, aftaná at hava fingið játtan, búsettust uttanlands,
- at pensionistar, sum høvdu gjaldsskyldu (bidragspligt) mótvegis børnum, fingu barnaviðbót sum aðrir pensionistar við uppihaldsskyldu, og
- at hækkingar vórðu gjørdar í pensiónsveitingunum í samsvari við upphæddirnar í hinum ríkispørtunum, ið vóru hækkaðar útyvir automatisku prístalshækkingarnar.

Inntøkuóheft grunduppheedd, núggjur avlamispensións-strukturur o.a. í 1967
Lógarbroytingarnar í 1967 umfataðu fleiri prinsippiellur broytingar.

Viðvíkjandi fólkapensiónini bendi tann broyting, at øll yvir 67 ár, undantikið tey, sum fingu afmenna tænastumannaeftirløn, fingu fulla grunduppheedd, ið var væl hægri enn minstauppheeddin. Hetta uttan mun til figgarlig viðurskifti annars. Stats- og aðrir tænastumenn varðveittu minstauppheeddini. Umframt hetta varð barnaviðbótin gjørd óheft av inntøku. Sum mótvekt móti omanfyristandandi, ið fyrst og fremst kom teimum figgarliga vælbjargaðu til góðar, varð pensiónsviðbót innført til teirra, sum lítið og onki høvdu av inntøku við síðuna av pensiónini.

Avlamispensiónin varð, umframt hækkað munandi, grundleggjandi broytt. Pensiónin skuldi útgjaldast í trimum stigum, alt eftir hvat talan var um at endurbøta fyri: fult, try kvart ella hálvt avlamni.

Aftanfyri broytingarnar, sum áðrenn vórðu framdar í Danmark, liggur í fyrsta lagi sjónarmiðið, at avlamispensiónin skal vera hægri enn fólkapensiónin, tí avlamispensionistar eru í einum aldri, har vanligt er at hava arbeiðsinntøkur. Í øðrum lagi er broytingin grundað á endurgjaldssjónarmiðið, sum hevur við sær, at pensiónin skal vera sambærilig við lønarlagið í samfelagnum. Og í triðja lagi, at pensiónin skuldi lagast eftir, í hvussu stóran mun arbeiðsførið varð niðursett.

Avlamispensiónsskipanin fekk í 1967 tað snið, hon hevur í dag:

Hægsta avlamispensión (óarbeiðsføri = 1):
- grunduppheedd
- avlamisviðbót (1/2 grunduppheedd)
- óarbeiðsførisviðbót (1/2 grunduppheedd)

Miðal avlamispensión (óarbeiðsføri = 1/2):
- grunduppheedd
- avlamisviðbót

Lægsta avlamispensión (óarbeiðsføri = 1/2):
- 1/2 grunduppheedd
- 1/2 avlamisviðbót

Avlamisviðbótin avloysti gamla avlamisískoytið. Avlamis- ella óarbeiðsførisviðbótin vóru óheftar av inntøku við síðuna av pensiónini. Avlamisveitingin (til ikki-pensionistar) varð ásett við sonu uppheedd sum avlamisviðbótin.

Allar upphæddir hækkaðu, soleiðis at samsvar var millum ríkispartarnar, hvat veitingarstøði viðvíkti.

Figgjarligu avleiðingarnar av lógarbroytingunum vóru ein so mikið stórur meirkostnaður, at nettarbundna grunduppheddin til fólkapensionistar varð framd sligvíst fram til 1970. Harumframt varð fólkapensións gjaldið hækkað frá 1 til 2,5 % av skattskyldugu inntøkuni.

Av øðrum broytingum í 1967 kunnu nevnast:
- at aldurstreytirnar fyri avlamispensión vórðu broyttar aftur, soleiðis at avlamispensión ikki kundi játtast, broytast ella takast aftur aftaná 60 ára aldur, men at miðal avlamispensión kundi játtast til persónar millum 60 og 67 ár, um arbeiðsførið var niðursett samsvarandi treytunum fyri hægstu avlamispensión,
- at húsliga hjálparviðbótin varð avtikin
- at eftirlivandi hjúnafelagi hjá einum pensionisti kundi fáa samlaðu pensiónina í 3 mánaðar aftaná andlát hjúnafelagans, uni eftirsitandi eisini var pensionistur, og
- at pensiónsretturin hjá serforsorgarsjúklingum varð víðkaður frá 1 til 6 mánaðar aftaná innleggingar mánaðan.

Avtøka av pensiónsgjaldinum, broytt inntøkugrundarlag fyri útrokning o.a. í 1970
Pensiónsgjaldið varð, aftaná at hava verið í gildi í góð 10 ár, avtikið í 1970.

Annars vórðu broytingar gjørdar, sum í ávísan mun høvdu við sær einfaldari umsiting av lógini. T.d. varð farið frá at javna grundupphædd og pensiónsviðbót eftir ymiskum inntøkuásetingum. Í staðin fyri at javnu pensiónirnar eftir nettoinntøkum (inntøku minus skatt) skuldu ber javnast eftir bruttoinntøkum, t.v.s. eftir inntøkum uttan frádrátt fyri skatt og aðrar frádráttir. Tillagingar blívu gjørdar í frádráttarfríu upphæddini, soleiðis at broytingin í inntøkuásetingini ikki fekk avleiðingar fyri veitingarstøðið. Frádráttarprosentið varð broytt til 60% av inntøkuni mótvegis fyrr 60, 72 og 84 prosent, treytað av inntøkustøddi.

Av øðrum broytingum kunnu nevnast:
- at inntøkuhefta pensiónsviðbótin ikki kundi veitast pensionistum, sum fingu pensión við uttanlands,
- at tænastumenn, ið fingu eftirløn sambært broyttu lógini um tænastumannaeftirløn frá 1969, skuldu fáa fulla grundupphædd, meðan samskipanarfrádráttur varð gjørdur í tænastumannaeftirlønini. Tænastumenn eftir gomlu lógini vardveittu minstuupphæddina, men varð ongin frádráttur gjørdur í tænastumannaeftirlønini,
- í sambandi við gjald fyri uppihald á ellis- og røktarheimi skuldi pensiónin í prinsippinum ikki falla burtur, men siggjast sum partur av gjaldinum fyri uppihaldið. Gjaldsreglurnar blivu broyttar, soleiðis at gjaldið í mesta lagi kundi vera 60% av inntøkuni, og
- samstundis sum fólkapensiónsgjaldið fall burtur, varð býtið av útreiðslunum millum statin og heimastýrið broytt frá lutfallinum 4:3 (av útreiðslunum, tá pensiónsgjaldið varð dripið frá) til 1:1 av bruttoútreiðslunum, og varð heimilað heimastýrinum at avgera, hvussu føroyski parturin varð fíggjaður: yvir vanligu skattin, við avgjøldum ella á annan hátt.

Vísandi til, at fólkapensiónsupphæddin í prosentum av bruttoarbeiðslønini hjá einum ófaklærdum arbeiðara í Føroyum var umleið tað sama sum í hinum ríkispørtunum (ávikavist 48,4 og 48,8%) og vísandi til, at pensiónsviðbótin í hinum ríkispørtunum varð hækkað fyri at veita endurgjald fyri miss í sambandi við skattligar broytingar í Danmark, blivu hesar upphæddir, umframt viðbøturnar í avlamispensiónini, ikki hækkaðar í 1970.

Gongdin frá 1972 til í dag
Møguleikin fyri at fáa pensión áðrenn vanligan pensiónsaldur varð í 1972 víðkaður soleiðis at persónar, sum høvdu fylt 60 ár kundu fáa framskundaða fólkapensión grundað á vantandi vinnumøguleikar. Hugsað varð serliga um teir fiskimenn í fjarfiskiskapi, sum orsakað av heilsu-trupulleikum og vantandi møguleikum fyri øðrum arbeiði á landi, máttu gevast, tá teir komu upp í árini. Reglan viðvíkjandi tilkennan av pensión vegna "svigtende helbred" verður víðkað til eisini at umfata "manglende erhvervsmuligheder" og "undtagelsesvis" í lógargreinini varð strikað til tess at slaka krøvini.

Fyri at geva so nógvum eldri sum gjørligt møguleika at verða verandi heima og harvið eisini sum longst at forða fyri innlegging á ellis- og røktarheim, vórðu reglur í 1972 innførdar í fólkapensiónslógina, sum heimilaðu at veita stuðul til umbygging av bústaðnum og hjálpartól, í prinsippinum uttan atlit til fíggjarlig viðurskifti hjá tí einstaka. Reglan um stuðul sum persónligt ískoyti kundi frammanundan nýtast til hetta endamál, men var treytin tá, at fíggjarligu viðurskiftini loyvdu eyka stuðli.

Frádráttarprosentið fyri javning av pensiónsviðbótini varð í 1973 sett niður frá 60 til 30 kr av hvørjum 100 í inntøku útyvir pensiónina, og pensiónsstøðið varð hækkuð við 15% fyri at skapa samsvar millum føroysku pensiónirnar og tær í hinum ríkispørtunum, sum í 1972 vórðu hækkaðar útyvir tær hækkingar, sum stóðust av prístalshækkingum.

Umsitingin av sosiallóggávuni varð yvirtikin av heimastýrinum í 1975, og varð Almannastovan sett at umsita allar einstaklingsveitingar. Landsstýrið bleiv kærumyndugleiki fyri avgerðir, tiknar av Almannastovuni.

Undantikið hækkingum í upphæddum, sum fylgdu automatisku prístalsviðgerðini og onkrum smávegis justeringum, hendir ikki stórvegis fyrr enn í 1988, tá hesar broytingar vóru framdar:

- veitingarstøðið varð hækkað samsvarandi donskum hækkingum.
- pensión til hjún verður roknað fyri hjúnafelagarnar hvør sær samsvarandi donskum reglum, grundupphæddin skuldi einans roknast eftir egnari innføku, ikki hjúnafelagans,
- frádráttarfría upphæddin fyri regulering av grundupphæddini varð ásett við somu upphædd fyri stakar og giftar persónar,
- minstauppheddin til tænastumenn varð avskaffað (ongin eftir frá gomlu skipanini),
- heimildin at játta hjálpartól og endurbúgvingarfyriskipanir varð flutt frá Vanlukkutryggingarráðnum til Almannastovuna
- heimastýrið fekk heimild at gera reglur og fyriskipanir á serforsorgar- og røktarøkinum, og endurgjaldsskipanin á økinum verður broytt til heildarskipan, samstundis sum endurgjaldsskipanini á øðrum økjum varð gjørd einfaldari.

Í 1989 varð heimilað heimastýrinum at upprætta kærustovn at avgera kærur sambært sosialu lógunum, burtursæð frá kærum um avlatnispensión, sum framhaldandi verða avgjørdar av donskum myndugleika.

Í 1992 varð heimilað umsitingini at veita stuðul til bústaðarútreiðslur sambært reglunum um persónligt ískoyti við afturgjaldsskyldu og tinglýsing av kravintum.

Í 1993 varð bíðiviðbótin avskaffað, og regla innført um frádrátt í grunduppheddini fyri arbeiðsinntøkur hjá 67-69 ára gomlum pensionistum.

Í 1994 varð tilskotsskipanin á sosiala økinum broytt frá endurgjaldsskipan til eina heildarveiting, og reglurnar um sats- og prístalsregulering v.m. yvirførdar til heimastýrið.

1. januar 1995 komu reglurnar um innvinnan av pensiónsrætti, sum tillaging til Norðurlendsku konventiónina, sum Føroyar undirskrivaðu í 1994, í gildi.

Og seinni í mai 1995 varð rammulógin fyri almannaveitingar í Føroyum viðtikin.

Umframt tær broytingar, sum nevndar eru, eru broytingar farnar fram, sum fylgja av bygnaðarbroytingum í donsku umsitingini, eitt nú viðvíkjandi kærumyndugleika, ráðgevingarskyldu o.a., umframt prístals- og satsreguleringarnar.

Síðan 1959, tá automatiska prístalsviðgerðin av pensiónunum varð sett í gildi, og fram til 1.7. 1993, hava veitingarnar verið javnaðar eftir donskum reglum. Við lóg nr. 227 frá 6. apríl 1994 verður heimilað heimastýrinum at gera reglur á hesum øki. Ongin regulering er farin fram síðan 1993.

Broytingar í einkjupenslónini síðan 1960

Reglurnar um hjálp til einkjur eru í forsorgarlógini, sum varð sett í gildi í 1960 í Føroyum. Frammanundan kundi hjálp veitast sambært lóg um fátækraverkið í Føroyum (frá 1895) og í lóg um kommunalar hjálparkassar (frá 1913). Rætt til einkjupensión høvdu

- kvinnur, sum blivu einkjur aftaná 55 ára aldur.
- kvinnur, sum blivu einkjur aftaná 45 ára aldur, ið høvdu uppihaldsskyldu fyri 2 ella fleiri børnum og
- undantaksvíst einkjur og einsamallar kvinnur, sum høvdu fylt 50 ár, eftir tørvsmeting (heilsu- og onnur serlig viðurskifti), umframt einkjur, sum høvdu fingið einkjupensión eftir 2).

Einkjupensiónin varð tá, sum nú, ásett samsvarandi reglunum í fólkapensiónslógini og hava broytingar í støði o.ø. sostatt fylgt broytingunum í hesi lóg. Reglurnar annars hava verið sera álíkar teimum, sum framvegis eru galdandi.

Í 1977 vórðu treytirnar fyri at fáa einkjupensión broytnar til tað, tær eru í dag: vanlig einkjupensión til einkjur, sum hava børn undir 18 ár og í undantaksførum til 50 ára gamlar einkjur og einsamallar kvinnur yvir 50 ár, sí omanfyri undir 3).

Uppískoytisveitingin til einkjur, í upphædd svarandi til avlamisviðbót, varð í 1977 innførd við løgtingslóg, sum í 1983 varð broytt soleiðis, at hálv uppískoytisveiting kundi veitast í ár aftaná, at treytirnar fyri vanligari einkjupensión ikki longur vóru loknar.

Skjal nr. 1

Dagur 28.02.96 J.nr.

Nýggja pensjónslóg
Niðanfyri verður mett um fíggjarligar avleiðingar av uppskotinum um nýggja fólk- og fyritíðarpensjón. Metingin er gjørd við pensjónsútgjaldingini fyri desembur 1995 sum grundarlagi, og er gjørd so væl vit hava verið før fyri við tí stutta skotbráði, sum vit hava havt.

Fólkapensjón:

Grundarupphædd:
Broytingin samanborið við núverandi pensjónslóggávu er, at grundarupphæddin fyri tey 67-69 ára gomlu ikki verður inntøkujavnað.

Í skipanini eru skrásettur 916 persónar, og hava umleið 67 av hesum arbeiðisinntøku. Umframt eru skrásettir 52 hjánaðarfelagar 67-69 ára gomul, sum vegna inntøku ongan pensjón fáa.

Meirkostnaður av ongari inntøkujavning av teim 916 er mettur til.....-1.200.000
52 hjúnaðarfelgar á 28.152 .....-1.463.904
Okkum vantar tøltni fyri 67-69 ára gomul, sum als ikki eru skrásett í pensjónsskipanini, men hesi eru ávegis frá Landsgjólkyvirlitinum.

Hjúnuðarbrodsviðbót
Hjúnaðbandsviðbót fellur burtur. Sparingin er .....-80.000

Aldursviðbót
Aldursviðbót fellur burtur. Sum er, verða 4.277.856 krónur latnar í aldursviðbót til 1209 persónar. Henda útreiðsla fellur burtur so hvørt, sum tey doyggja, og er 0 eftir u.ei0 20 árum.

Aldurbýti av hesum fólkum er:

ÁR	Tal	Upphædd
80	206	683.492
81	123	415.388
82	165	565.620
83	137	479.820
84	112	319.968
85	95	344.904
86	82	305.712
87	69	252.696
88	54	199.524
89	43	157.512
90	24	92.052

91	24	92.052
92	25	97.596
93	14	53.496
94	09	33.576
95	11	43.296
97	2	7.872
99	1	3.936

Bíðiviðbót:
Bíðviðbótin fellur burtur so við og við. Sum er verða 172.000.- útgoldnar í bíðviðbót til 80 persónar millum 71 og 95 ár.

Hægsta fyritíðarpensjón

Hjúnabandsviðbót
Hjúnabandsviðbótfellur burtur -42.000

Miðal fyritíðarpensjón

Hjúnabandsviðbót
hjúnabandsviðbót fellur burtur ..... -125.000

Fyri meðal og hægstu fyritíðarpensjón fellur 20 % frádráttur burtur.
Her er talan um 25 persónar og ein meirkostnaða uppá .....-269.000

Lægsta fyritíðarpensjón
(Inniheldur núverandi lægstu avlamispensjón. Ítilkapensjón áðrenn tíðina. 62 66 ára gomul gift við 67-69 ára gomlum)

Grundarupphædd/fyritíðarupphædd
Hetta verður mett til ein meirkostnaða .....-2.623.000

Frá hesum talinum skal trekkjast núverandi kombinatiónum 26/04, sum eru umleið 40 í tali.

Børn við halvari barnaviðbót
Her er talan um 68 børn á 334,- ella .....-292.500

Kompensatión fyri mista avlamisviðbót
28 persónar ella.....-267.200

Einkjupensjón
Meirkostnaður vegna broytttan frádrátt..... 105.000

Avlamisveiting
Ongin broyting
Umframt eru 9 avlamispensjónistar 15 - 17 ár.
Samskipanarfrádrátturin fær ongan fíggjarligan týdning.

Skjal 3

Dagu 17.03.96 J.nr.

Edv-støðun á Almannastovuni
Á Almannastovuni kunnu edv-uppgávurnar bólkast í 2 sløg.

Vanligar skrivstovuskipanir við tekstviðgerð, rokniarki, postsambandi og fortitum annars, sum fáast til keyps liðug. Hesi verða avgreidd í PC-umhvørvi, har PC'arar eru samanbundnir í neti. Ambætarin er ein SCO-UNIX telda, og umframt gevur hon møguleika fyrt at spyrja uppá ávísir upplýsingar inni á Elektron.

Á Almannastovuni finnast harumframt skipanir, sum eru forritaðar burturav til Almannastovuna.

Hesar uppgávur umfata:

Umsiting av pensjónum.
Umsiting av forsorg.
Umsiting av dagpengum.
Entsjóumalumsiting.
Umsiting av lønum til heimarøktina og til serstovnadeildina.
Umsiting av heimahjálp.
Umsiting av alimentatión.
Umsiting av ansing og pleyguløn.
Og aðrar smærri uppgávur.

Hesar deilskipanir verða nýttar í dagliga arbeiðinum, og eru sostatt funktiónsførar, men virka ikki vøktandi. Til deils eru tær ongantíð liðugt gjørdar, og viðferir hetta, at á Almannastovuni finnast ynskilistar til hvørja einastu av hesum deiluppgávur, sum nær fevna bert um smábroytingar, aðrir eru sera umfatandi. Og til deils er ongantíð komur so langt, at neyðugar skipanir eru gjørdar, sum á skynsaman háttur kunnu lýsa, hvørji tilknýti ein klientur hevur yvirfyri Almannastovuni sæð í einum stórri høpi. Av tí, at ongin integratión er farin fram, er mangan torført at fáa eitt rímiligt yvirlit yvir ein klient.

Hesar skipnir koyra á IMAGE databasum á HP3000 teldu. IMAGE databasin var væluntóktur í 80'árunum, men í dag verða slíkir netverksdatabasar ikki nýttir longur, og øll nýskapan fer fram við relatiónsdatabasum sum til dømis ORACLE, sum Føroya Gjaldstova fer at nýta í komandi fíggjar- og lønarskipan.

Á Almannastovuni eru í dag umleið 80 brúkarar. Teldan sjálv er gomul sæð í edv-høpi og er ikk dimensionerað til so nógvir brúkarar, og hetta hevur við sær, at svartíðin er ógvuliga tung, tá nógvir brúkarar eru loggaðir inn, ella tá "tungar" uppgávur koyra. So ring, at mangan fáa fólk ikki arbeitt. Í 1996 sum hava staðið áHeimahjálparskipanini og í Sigmundargøtu (Heilsu- og heimasjúkrasystrskipanin) niðurlagdar, og arbeiðið, ið var gjørt á hesum stovnum er flutt inn á Almannastovuna. Nú serstovnadeildin og hjálpitólarmiðstøðin er løgd inn undir Almannastovuna samstundis sum deildir varða latnar upp í Vágunum og seinni í Sandoynni, umframt at Almannastovan hevur fyri neyðini nógv størri samskifti við Føroya Gjaldstovu, Postverk Føroya, Elektron og seinni aðrar stovnar sum til dømis Apoteksverkið og Landsfólkayvirlitið, er upplagt, at núverandi telda ikki kann nýtast longu, men mui skiftast út. Ein umlegging av øllum deilskipanum Almannastovnunnar tekur 2-3 ár, og Almannastovan kann ikki bjóða arbeiðisfólki sínum at fara inn í 21. øld við eini kann man næsta siga so avoldaðari skipan.

Tað er tekniskt og fortitanarliga møguligt at innbyggja nýggja pensjónsløggávuna í núverandi skipan til fyrsta januar 1997, men Almannastovna kann ikki liva við hesi skipan fleiri ár fram í ríðina, og tí mæla vit til, at samstundis sum nýggja pensjónsskipanin verður sett í verk, at vit fortitu hesa av nýggjum við fyriliti

fyri einari loysn á ORACLE databasum. Men hetta krevur, at øll pensjónsskipanin skal kravfestast av nýggjum, og síðani umprogrammerast frá botni av. Hetta er dálgt men neyðugt arbeiði, skal edvið á Almannastovuni verða til at liva við í framtíðini. Alamannastovan hevur fólk, sum er ført fyri at gera hesar kravfestingar, meðan forritanararbeiði má gerast uttanfyri húsið. Mett verður, at Almannastovan ikki kann verða klár við nýggjari skipan fyrr enn 1. januar 1998, og tá vilja summar av edilskipanum okkara sannlíkt enn vera avgreiddar á HP3000 telduni, men kunnu so leggjast yvir til nýggju skipanina í 1998/1999.

Meðan slí nýskapan fer fram, krevja núverandi skipanir at viðlíkahildast, og tí hava vit ikki pening til at gera nýskapanir á játtan okkara.

Tí metir Almannastovan, at neyðugt verður við serligari játtan til nýgerð av edv-skipanum. Tað er ikki gjørligt uppá núverandi tíðspunkt at seta neyvan kostnaða á slíka nýgerð, tí verða tølini niðanfyri "kvalifiserað giss".

Til nýprogrammering og umskúling	umleið 1.5 mió.
Til keyp av relatiónsdatabasa (uml. 16.000 pr. arbeiðisplássi)	umleið 1.0 mió.
Keyp av høvuðsteldu til 80 brúkarar (tildømis HP9000 eins og FGI)	umleið 1.5 mió.

Tað er greitt, at tá skipanin verður sett í verk, verða ikki 80 brúkarar, men fyri at sleppa av við núverandi skipanir og núverandi HP3000 teldu, verður dentur lagdur á at umleggja allar skipanir so skjótt sum gjørligt.

Hetta eru tølini, um Almannastovan eins og í dag sjálv hevur teldurnar standandi og sjálv avgreiðir sínar koyringar.

Føroya Gjaldstova hevur sagt seg sinnaða til at samstarva við Almannastovuna um databasar og teldu, og greitt er, at loysnin tá verður nakað billigari. Vit hava í hesum sambandi eftirlýst ein yvirordnaðan politikk hjá Landsstýrinum viðvíkjandi hvørjir tankar, teir gera sær viðkjandi framtíðar edv-loysnum í Føroyum.

Fylgisskjal 4

Dagur 07.03.96 J.nr. 93.00E

Viðmerkinga Almannastovunnar til samanløgdu pensiónslóggávuna

Almennar viðmerkingar

1. innliting

Almannastovan skal gera vart við, at ein høvuðstreyt fyri at Almannastovan kann røkja sínar skyldur til lítar mótvegis sínum ciðskiftafólki, er at hon fær neyðugu ambodini at arbeiða við. Her verður m.a. hugsað um ta tøkniligu tillagingina til pensiónslóggávuna.

Samskiftið við Toll- og Skattstovu Føroya (T&S) er av avgerandi týdningi.
Almannastovan hevur havt fund við T&S og fekk ta greiðu fatan, at T&S hevur ikki allar teir upplýsingar, sum sambært hesi pensiónslóg skulu nýtast í útrokningargrundarlagnum fyri at útrokna pensiónina, m.a. vóru vinnings býti og eftirløn nevnd sum dømi. Almannastovan vísir á, at skal lógin umsitast optimalt, mugu vit fáa allar upplýsingar, og kunnu vit ikki fáa tær, so má politiski myndugleikin avgera, hvørt ein loysn verður funnin til tess at fáa hesar upplýsingar til vega ella at tær verða sleptar sum liður í útrokningini av pensiónini.

2. Onnur lóggáva

Almannastovan vísir eisini á, at øll "grannalóggáva" má kannast, og fáast at sampakk. T.e. at har ásetingar í hesi lóg møguliga koma at stríða móti aðrari lóggávu, so mugu neyðugu broytingarnar gerast so tær sampakka. t.d. kann verða nevnt at T&S møguliga fær tropulleikar við skrásetingarlógini, og eisini má kannast, um henda lóg sampakkar við Norðurlendsku Konventiónina.

3. Uppskot til broytingar

Víst verður á almennu viðmerkingarnar á s. 23, og vart verður gjørt við, at ásetingarnar um at lata lønarinntøku ávirka pensiónina í størri mun enn onnur tinntøka beinleiðis "venda tunga endan niðureftir", tí tað sjálvandi eru tey fíggjarligu frægari stillaðu, ið hava skunnað skapt sær møguleika fyri at hava rentuinntøku og aðra pensiónsinntøku. Sosialpolitiskt sæð er hetta prinsippið skeivt.

Almannastovan skjýtur harafturat upp, at hugtakið einkjur og einkjumenn verður strikað í nýggju lógini, og at shi verða at meta sum einlig. Orsøkin er hesin skilnaður millum einkjur og kinkjumenn øðrumegin og einlig hinumegin, hevur havt óhepnar fylgju við sær.
Skulu fyritíðarviðbøturnar vera, sum skotið verður upp, skulu tær útgreinast nærri (helst fáa hvør sítt beiti), so eingi ivi er um, hvørja viðbót talan er um.

Somuleiðis skjýtur Almannastovan upp, at pensiónsútreiðslurnar kundu verðið býttar øðrvísi, soleiðis at tey, ið eru ringast fyri, fáa luttfalsliga meira í sín part. Útreiðslur landskassans verða ikki øktar, tá hetta t.d. kann verða gjørt á tann hátt, at grundarupphæddin verður minkað og pensiónsviðbøturnar hækkaðar samsvarandi.

Mælt verður til, at pensiónin verður sett saman av sonn upphæddum. Ísansað um talan er um hjún, har bæði fáa pensión ella bert annað teirra. Stakir persónar skulu so fáa eina serliga viðbót. Henda broyting hevði lætt munandi um umsitingina av lógini.

4. Málsligir spurningar o.a.

Annars verður mælt til, at lógaruppskotið verður gjøgnumgingið av fólki við málsligum kunnleika, eins og ein neyv "lógarteknisk" gjøgnumgongd verður gjørd.

Sum dømi um málsligar broytingar kunnu vit nevna, at "stk." átti at verið "petti", "pensjón" verður broytt til "pensión", "grunupphædd" verður broytt til "grundarupphædd" o.s.fr.

Konkretar viðmerkingar

Grein 1:
Definitión skal gerast bæði av pensión og pensiónisti. Almannastovan hevur havt dømi um, at vit meta persón sum pensiónist, sjálvt um hann ikki fær pensión, og tað kann hava týdning í ymiskum støðum.
Annars metir Almannastovan tað vera sera heppi, at lógin byrjar við hvat er at skilja sum pensiónistur og pensión í hesi lóg.

Grein 2:
Kunnu vit bróka "móttakarin" ístaðin fyri "3 fær veitin" ?
"Játtan av" verður broytt til "rættindum til"
3. petti skal samsvara við konventiónina.

Grein 3:
Yvirskriftin: Átti at verið "innvinnan av pensiónsrættindum"

Orðingin í ehsi grein lýkur ikki treytirnar í Konventiónini (15-67 ár). Í hesi grein stendur bert "persónar yvir 67 ár"

Grein 4:
Skal sampakka við Konventiónina.

Grein 5:
Lógirnar um bjálving og brennistuðning mugu definerast í nmn til hesa greinina. Hava tey, ið fáa deilpensión rætt til bjálvingarstuðul og brennistuðul. Um ja - hvussu nógv??

Grein 6:
Skal samsvara við Konventiónina.

Grein 7:
Orðið "avrunda" merkir tað hækka ella lækka??

Grein 8:
Í lagi.

Grein 9:
Í lagi.

Grein 10:
Í lagi - tó málsilgar villur.

Grein 11:
Almannastovan hevur javnan mett tað sum eitt trupulleika, at hægsta pensión ikki kann játtast til viðskiftafólk, ið eru eldri enn 60 ár. Áseting in hevur onga meining, síðan tryggingarparturin verð tikin úr avtalispensiónslógini. Metingin má vera, at lán o.a. eru lagað eftir, at tú væntar at vera í vinnu, til tú kemur í vanligan pensiónsaldur. Inntøkumissurin er hin sami, um tú ert 59 ella 60 ár, og inntøkan er valiga ikki lægst tey seinastu árini á arbeiðsmarknaðinum.
Vit meta, at aldursmarkið fyri allar fyritíðarpensiónistar átti at verið broytt til 67.

Grein 12:
§ 12. 2. petti (samanber almennu viðm. s. 20): Almannastovan metir framvegis, at tað er sosialpolitiskt skeivt at hava lætta atgongd til at pensionera einkjur og einkjumenn, ið eru so ung, at tey enn hava uppihaldsskyldu at børnum. Hetta kann lættliga hava við sær ógvuliga stórar sosialar avleiðingar, ikki minst avbyrging. Tey eru munandi betri hjá við eitt nú endurbúgving e.ø. tiltøkum eftir forsorgarlógini.

Einkjurnar/einkjumennirnir eiga at verða koyrd burtumr lógini sum serstakur bólkur.

Grein 13:
Skulu tey, ið eru yngri enn 50 ár, ikki hava rætt til lægsta fyritíðarpensión -eisini av sosialum orsøkum (og iki bert læknaligum) ?

Grein 14:
Verður óviðkomandi, um broytingarnar verða gjørdar í greinunum 11 og 12.

Grein 15:
Orðingin "kræfter og færdigheder" verður nýtt á donskum. Vit meta ikki, at tann føroyska týðingin er nóg beinmkin/umfutandi.

Grein 16:
Meira arbeiði hjá Almannastovuni.
Útilokar allar einkjupensiónir.

Grein 17:
Í lagi.

Grein 18:
Í lagi.

Grein 19:
Óarbeiðsførisviðbót verður strikað, soleiðis at greinin endar við "fyritíðarviðbó".

Grein 20:
2. petti leggjast saman við "einkjuproblematikkinum".

Grein 21:
Í lagi.

Grein 22:
1. petti: Í lagi.
2. petti: Í lagi.
3. petti: Konventiónin!

Grein 24:
Grein 24 er í okkara verð ein "tekniskur" trupulleiki, sum má greiðast við T&S.
Viðvíkjandi innihildinum er greinin í lgi, tó skal viðmerkjast, at ATP verður roknað sum inntøka - sum nú er.
Ber tað til, at ognarinntøkan skal býtast í tvey??
4. petti: "inntøku av upphæddum" broytast til "inntøku av ongum", "pensiónisturin við burturgeving" broytast til " pensiónisturin og hjúnafelagin við bruturgevin".
Annars verður mett, at 4. petti er so gott sum ógjørligt at umsita.

Grein 25:
Einkjuproblematikkurin eisini við her.

Grein 26:
Í lagi.

Grein 27:
Skal samsvara við Konventiónina.

Grein 28:
FUR avger røktar- og hjálparviðbót. Skulu tey ikki eisini tka avgerð viðvíkjandi ansing av eldri og óhjálpnum? Ansingin verður nevniliga veitt samb. læknaligum metingum, FUR má sigast at vera tann læknaligi sammunnleikin.
Eru allir fyritíðarpensiónistar umfataðir av greinini?
Greini átti at havt 3 petti, soleiðis at hjálp røkt og ansing av eldri standa høvr í síni grein.

Grein 29:
3. petti: Verður ikki praktiserað.
4. petti, nr 2 má verða knýtt saman við "einkjuproblematikkinum".

5. petti: Barnaviðbótin eigur at verða útgoldin skattafrítt til pensiónistin.
6. petti: Broytast til "eftir barnið er født".

§ 29, 1. og 3. petti: Neyðugt er at fáa sligið fast, um "normalbidragið" er fiðir og móðurgjald, tá bæði eru pensiónistar. Hetta hevur eisini áhuga í mun til forsorgarlógina. Almannastovan metir, at talan sjálvsagt eigur at vera um bádar partar av gjaldinum.

Grein 30:
"viðbót" skiftast út við "ískoyti".
Ístaðin fyri "trong fíggjarlig kor" átti at staðið "serliga trong kor". Hetta tí at neyðugt kann vera at veita ískoyti, bóast tey fíggjarligu korini eftir vanligari meting ikki eru trong. Viðmerkingin til samsvarandi greinirnar (almennu viðmerkingarnar, st 16) í gomlu lógunum er beinleiðis skeiv í mun til galdandi lógartekst.
2. petti: Í lagi.
3. petti: Seta greiðar reglur millum grein 18,5 í forsorgarlógini og persónligt ískoyti. "Verður veitt" broytast til "kann veitast".
4. petti: Í lagi.
5. petti: Ílagi.

Grein 31:
2. petti: "hava rætt til" broytast til "fáa".

Grein 32:
"Avlamisiskoyti" strikast: ongin fyritíðarpensiónistur fær avlamisiskoyti.

Grein 33:
Er yvirskriftin rætt sæð í mun til grein 1? Kanska átti at staðið "Avlamisveiting".

Grein 34:
1. petti: Størri arbeiðsbyrða hjá Almannastovuni.
2. petti: Størri arbeiðsbyrða hjá Almannastovuni. Skulu umsóknarblaðini til hjálpar- og nøktarviðbót viðgerast á Almannastovuni?
Broytingar, sum Almannastovan annars heldur vera rímuligar - men fara at hava við sær munandi meira arbeiði fyri Almannastovuna. Tí verður helst neyðugt við minst trimum starvsfólkum afturat til at loysa uppgávuna.
3. petti: Málsligar broytingar.
4. petti: Almannastovan skal gjalda læknaváttan, óansæð, og heldur tað vera nargháttligt, um hon hvørt skal gjalda fyri læknaváttanina, um pensión verður játtað. Tafan er ikki um gjald fyri at medvirka til, at persónur fær pensión, men um gjald fyri eitt umfatandi, fakligt krevjandi arbeiði, ið ikki verður lønt. Viðskiftafólkið søkir sjálvandi pensión, tí tað heldur seg lúka treytirnar. Viðkomandi væntar tí ikki - og eigur ikki at kunna vænta - at fáa úteiðslur av at royna at fáa sín rætt sambært almannalóggávuni.
5. petti: Málsligar broytingar.

Grein 35:
Í lagi.

Grein 36:
Í lagi.

Grein 37:
Í lagi. Tó meira arbeiði til Almannastovuna.

Grein 38:
4. petti: Óneyðugt.

Grein 39:
Greinin er óneyðug. Um so er, at ein persónur hevur akuttan tørv á pengum, kann hann fáa hesar sum forsorgarhjálp, sum síðani verða umkonterða, um pensión verður játtað.
Grein 40:
1. petti: Skal gjaldast forút.
2. petti: Loyst við beinleiðis sambandi til Landsfólkayvirlitið.
3. petti: Sampakka við Konventiónina og siga FUR frá, sum skal senda sínt skjøl.
4. petti: Í lagi, men hvussu við øðrum londum uttanfyri konventiónsøkið?

Grein 41:
Í lagi, tó átti "onnur privat" at verið "øðrum".
Nýtt 2. petti: "Landsstýrið ásetir nærri reglur..."

Grein 42:
Í lagi.

Grein 43:
1. petti: Inntøkurnar verða ov gamlar, um 1. januar skal standa, t.d. eru inntøkurnar fyri 1995 ikki tøkar fyrr en 01.10.1996.
2. petti: Í lagi.
3. petti: Orðingin "reint fyrihils" er ógreið.
4. petti: Í lagi.
5. petti: Í lagi.
6. petti: Enda við "útgoldin", restin strikast.
7. petti: Strikast.

Grein 44:
"Skal lækka" verður broytt til "lækkar".
Grein 45:
Í lagi.
Grein 46:
Greinin býtast upp í 2 petti, soleiðis at 2. petti byrjar: "Um so er, at---".
Í 1. petti eigur at verða víst til §§ 11, 12, 1. petti og 13, 1. petti.

Grein 47:
Inntøkumarkið skal vera ymiskt, alt eftir um talan er um miðal fyritíðarpensión ella hægstu fyritíðarpensión.

Grein 48:
1. petti: Fáa pensiónina aftur frá tí degi, tey eru útskrivaði frá psykiatrisku deild.
Fáa játtað pensión tá tey eru innløgd, men fáu hana ikki úgoldna, fyrr enn tey eru útskrivaði.
pettini 2-4: Persónlig viðbót skal eisini detta burtur.
5. petti: Grein 49, stk. 2: Broytast til "§ 49, 1. petti".
6. petti: Broytast til at tey fáa eina barnaviðbót.
7. petti: Í lagi.
8. petti: Í lagi.

Grein 49:
1. petti: Broyta 60-ára markið til 67 ár og hækka 20%-upphæddina.

Grein 50:
1. petti: "varðveita livikor familjunar higartil" broytast til "varðveita rímilig livikor".

Grein 51:
1. petti: Í lagi.
2. petti: Í lagi.
3. petti: "munandi" strikast.
4. petti: Heldur ikki juridiskt. Eisini tupulleikar við T&S.

Grein 52:
"sambágvandi" fellur burtur.

Grein 53:
Fellur burtur: Upphæddirnar ásetast við kunngerð.

Grein 54:
3. petti: Strikast.

Grein 55:
3. petti: Strikast.
4. petti: Almannastovan heldur tað vera óhamingjuverk at umhugsa at flyta kærumyndugleikan í avlarnispensiónsmálum til Kærunevndina fyri almannamálum, utta so at skrivstovufunktiónin hjá kærunevndini verður styrkt við fleiri heiltíðarstørvum afturat. Harumframt krevur hetta helst eisini eina øðrvísi samanseting av kærunevndini.

Grein 56:
Avgerðin um játtan av pensión verður tikin á serligum fundi á Almannastovuni.

Grein 57:
Í lagi.

Grein 58:
Í lagi.

Grein 59:
Í lagi.

Grein 60:
Í lagi.

Grein 61:
1. petti: Í lagi.
2. petti: Almannastovan ivast í, hvørt tað er rætt at flyta avgerðarheimildirnar viðvíkjandi játtan av pensiónum og endurbúgving. Fyri okkum at siggja virka veruni skipanin rættiliga væl, og líta vit at royndunum frá skrivstovufunktiónini hjá Kærunevndini í almannamálum, er í hvussu er greitt, at heimildirnar ikki kunnu flytast, uttan at nýggi fyrisitingarligi myndugleikin verður so mikið væl mannaður, at til ber at skapa eitt livandi, sjálvstøðugt, fakligt umhvørvi.

Grein 62:
Í lagi.

Grein 63:
Í lagi.

Grein 64:
Í lagi.

Grein 65:
Í lagi.

Grein 66:
Hygg tó eftir grein 68 í lov om social pension. Henda grein hevur við sær, at persónur við donskum heimarætti, sum er føddur í 1938 ella áður, kann flyta til FR og fáa pensión, hóast hann ikki lykur treytirnar í DK.

Grein 67:
Í lagi.

Grein 68:
Í lagi.

Grein 69:
Í lagi.

Grein 70:
Í lagi.

Greitt 71:
Í lagi.

Føroya Landstýri, Almanna- og Heilsumálastýrið, Postsmoga 64, 110 Tórshavn

Art.: Høgni Joensen, aðalstjóri og Jóan Hendrik Svabo Samuelsen, fulltrúi

Viðv. uppskoti til øgtingslóg um sosialar pensiónir

Almanna- og Heilsumálastýrið hevur við skrivi dagfest 4. juni 1997 sent grannskoðanardeildini uppskot til løgtingslóg um sosialar pensiónir til ummælis.

Av góðum grundum høvrki kann ella skal grannskoðarnardeildin ummæla uppskot um, hvussu landsstýrð ætlar at skipa pensiónsviðurskiftini hjá avlanuis- og fólkapensjónistum, og grannskoðanardeildin fer tí ikki gera viðmerkingar til tað innihaldsliga/materiella í lógaruppskotinum.

Men í hjálagda notati hava vit vist á ávísar ógreiðar orðingar v.m., sum knýta seg til lógaruppskotið generelt, til ásetingarnar og viðmerkingarnar um inntøku- ogarviðurskiftini og til einstakar lógargreinar annars.

Samanumtikið er niðurstøða okkara:

I. Generelt lógaruppskotið

Mett verður, at viðmerkingarnar til tær einstøku greinarnar í lógaruppskotinum í nógvum førum ikki kunnu nýtast sum tulkingargrundarlag.

2. Inntøku- og ognarviðurskifti

Viðvíkjandi inntøku- og ognarviðurskiftum hava vit serliga roynt at sett okkum inn í hvussu landsstýrið við lógaruppskotinum hevur loyst verandi nógvu umsitingarligu trupulleikar á heusm øki. - Eftir at hava gjøgnumgingið uppskotið, verður mett, at hesir lagnt frá eru loystir.

3. Aðlot lógargreinar

Á fleiri týðandi økjum tykist lógaruppskotið verða ófullfíggjað, tí tað er so torført at ímynda sær, hvat ætlanin er við ávísum greinum og hugtøkum m.a. vísandi til at tær nógvu ásetingarnar um, at *"landsstýrið ásetir nærri reglur"*, ofta uttan at greiðar ábendingar eru um hesar í viðmerkingunum.

Í hjálagda notati hava vit greitt nærri frá gjøgnumgongdini av lógaruppskotinum og viðmerkingunum, og vit hava í hesum sambandi roynt at vís á nakrar lógargreinar/orðingar ella viðmerkingar, sum eftir okkara tykki ikki eru nóg neyvar.

Vónandi kunnu viðmerkingar okkara vera við til at tryggja, at komandi pensiónslóggáva verður greið og so løtt at umsita sum gjørligt. Um so er, at tygum hava spurningar til omanfyristandandi ella hjálagda tilfar, eru tygum altíð vælkomin at venda tygum til okkara.

Vinarlig heilsan, Leivur Harryson, Birgit Vitalis Ottosen

25. Jul. 1997
F.T.-j.nr. 1015-7/91

Notat viðvíkjandi uppskoti til løgtingslóg um sosialar pensjónir

1.0 Generelt um lógaruppskotið

Uppskotið er sent grannskoðanardeildini við skrivi dagfest 4. juni 1997, men viðmerkingarnar í uppskotinum eru ikki dagførdar/tillagaðar viðkomandi skattalógarbroytingum, ið eru samtyktar í vár.

Viðmerkjast skal, at sambært § 37, stk. 3, nr. 2 í Tingskipan Føroya Løgtings skal í viðmerkingunum til lógaruppskot vera "serligar viðmerkingar, har greitt verður frá innihaldinum av hvørjari einstakari grein í uppskotinum. Eisini skal her verða greitt frá ætlanini við greinini, og hvussu hon skal skiljast".

Mett verður, at "tulkingar" av ávísum greinum í nógv størri mun ætlu at verið gjørdar í viðmerkingunum. Viðmerkingarnar til tær einstøku greinarnar eru í hesum uppskotinum í nógvum førum bert tilvísingar til galdandi lógar greinar, og kunnu tí ikki beinleiðis nýtast sum tulkingargrundarlag. Fyri at fáa eina bóning av endamáli ella eina fatan av eini grein, bugtaki ella ávísari orðing er tí í nógum førum neyðugt at leita fram álit, viðmerkingar, kunngerðir, rundskriv, vegleiðingar o.l. til danskar lógir, ið ofta eru farnar úr gildi ella broyttar í Danmark. - Eitt av endamálunum við at fáa føroyska almannalóggávu var at minka um hesar tulkingartrupulleikar.

2.0 Inntøku- og ognarviðarskifti

Grannskoðanardeildin og Almannastovan hava í fleiri ár víst á, at ein stórur umsitingarligur trupulleiki hevur verið ógreiðu ásetingarnar í pensjónslóggávuni um, hvussu ognar- og inntøkuviðurskifti ávirka pensiónsútrokningarnar.

Vísast kann eisini á, at í september 1993 setti landsstýrið ein arbeiðsbólk at endurskoða og gera tilmæli viðvíkjandi tillging av ognar- og inntøkuupplýsingunum í skatta- og almannalóggávuni. Í eini frágreiðing

frá november 1993 vísti bótkurin á so nógvar ivaspurningar og grundleggjandi fyrisitingarligar trupulleikar, at skotið varð upp, at seta ein annan skjóttarbeiðandi arbeiðsbólk at halda fram við hesum arbeiði, og at koma við uppskoti til broytingar í pensjónslógunum sum heild, við tí endamáli at fáa eina einfalda og nútímans pensjónslóggávu, sum kann umsitast við verandi starvsfólkatali.

Arbeiðsbólkurin vísti m.a. á, at pensjónslóggávan onguntíð hevur verið fyri grundleggjandi endurskoðan, og at sosialu lógirnar ikki longur vóru samanhangandi, hvørki sínámillum ella við aðrar lógir, eitt nú skattalógina. Somuleiðis varð heitt á landsstýrið um at taka støðu til ávísar grundleggjandi aðalreglur og endamál við eini nýggjari lóggávu.

Víst verður herumframt til hjálagdu frágreiðing frá grannskoðanardeildini til Socialministeriet, sum varð send landsstýrinum til kunningar við skrivi dagfest 2. desember 1993. Her verður greitt nærri frá tulkingar- og umsitingarligum trupulleikar við verandi pensiónslóggávu. Eisini verður víst á, at tað er samlíkt, at nógvar útrokningar, serliga av pensiónsfrádrátti, ikki eru rættar.

2.1 Tær einstøku greinarnar í lógaruppskotinum, sum fevna um inntøku- og ognarviðurskifti

Í § 25, stk. 1 verður ásett, at útrokningargrundarlagið er: "...persónliga skattaskyldugu inntøkan uttan ávísar skattligar frádráttir". Ógreitt er, hvat hetta merkir, og ásett er, at: **"Landsstýrið ásetir nærri reglur".**

Í § 25, stk. 2,2. pkt er ásett, "fyri giftar persónar verður roknað við helvtini av samlaðu ognarinntøkuni fyri hvønn hjúnafelaga". Mælt verður til at umhugsa møguligar "fylgjur" fyri hjúnafelagar, sum hava serogn.

Í § 25, stk. 5 er ásett, at **"Laudsstýrið ásetir nærri reglur viðvíkjandi útrokning av inntøkugrundarlagnum".**

Í § 26, stk. 2 stendur "inntøka av <u>persónligum arbeiði</u>... ". Mælt verður til at lýsa hetta hugtakið.

Í § 44, stk. 4 stendur viðv. umrokning av pensiónum" við grundarlag í tí av skattavaldinum dagførdu inntøkuni". Ógreitt er, hvat hetta merkir. Er talan um tá inntøku, sum er skrásett í afturhaldsskipanini sum A-inntøka, ella er fyribilsskrásett B-inntøka v.m. eisini fevnt av hesum bugtakinum.

Í § 58 er ásett, at "Toll- og Skattstova Føroya skal <u>tryggja</u>, at upplýsingar um inntøku- og ognarviðurskifti eru tøkar í nýtiligum fromi... og ... <u>stuðla</u> Almannastovuni í framjan av reglunum í §§ 25 og 44". Ógreitt er hvussu "tryggja" og "stuðla" skal skiljast í hesum føri, hvussu er við ábyrgd- og heimild, og um samskifti hevur verið við landsstýrismannin í fíggjarmálum og/ella Toll- og Skattstovu Føroya um hesa áseting.

2.2 Viðmerkingarnar til tær einstøku greinarnar í uppskotinum, sum fevna um inntøku- og ognarviðurskifti

<u>Ad. 4.6. Inntøkugrundarlagið</u>

ad. a)
Í 3. pkt. verður nevnt, at "definitiónin av inntøku í pensiónslógini hevur sostatt ikki verið hin sama sum definitiónin av skattskyldugu inntøkuni. Og er helst eisini rættast at varðveita hendan skilnað framhaldandi".

Grundgevingarnar í viðmerkingunum fyri skilnaðinum ímillum inntøkuhugtøkini eru grunnar og ikki og neyvar, og havt merkir "hels", er landsstýrið í iva?

Viðari er ásett, at:

1. skotið er upp, at staðfest verður, at inntøkan í pensiónslógarinnar fatan, verður skattskyldugu inntøkun uttan aðrar skattligar frádráttir enn teir, sum
2. beinleiðis skulu ti fyri at vinna, tryggja og viðlíkahalda inntøkuna, t.v.s. teir frádráttir fyri rakstrarútreiðslur, sum frammanundan eru gjørdir í uppgerðini av inntøkuni (rokitskapinum) hjá sjálvstøðugum vinnurekandi og
3. ferðafrádráttur,
4. frádráttur fyri dupult húsarhald, gjøld til arbeiðsloysissipanina og eftirlønargjøld o.t. í lønarinntøkum.

Frádráttir, sum ikki skulu takast við eru t.d. fyri:

5. umvæling og umbygging av egnum bústaði,
6. konu- og barnapengar,
7. hall av egnum virki og húsleigu,
8. tap av lánum og ábrygdum til vinnuvirki,
9. avskrivingar o.t.

ad. 1. Skotið er upp
Hvar í lógaruppskotinum er hetta skotið upp?

ad. 2. Beinleiðis
Hvat merkir hetta?

ad. 3 - 4 og 6 Ferðafrádráttur, frádráttu fyri dupult húsarhald og fráttáttir fyri konu- og barnapening
Fleiri av teimum frádráttum, ið nevndir eru í lógaruppskotinum, sum frádráttir í lønarinntøkum, eru ikki til longur.

Hvørki í uppskotinum ella í viðmerkingunum eru ásetingar um/hvussu tær "nýggju stuðulsskipanirnar" so sum stuðul til rentuútreiðslur av lánum, til ferðaútreiðslu, til dupult húsarhald, til arbeiðsmarknaðargjald, til uppihaldspening og til telefonútreiðslur hjá langfarasjómonnum ávirka inntøkuhámørk v.m., sum ásett eru í lógaruppskotinum.

ad. 9. Avskrivingar
Av skrivngar eru ein partur av (skatt)roknskapinum hjá tí vinnurekandi, og verður "nettoúrslitið" skrásett í skattaskránna í Toll- og Skattstovu Føroya, sum B-inntøka.

Hvat fevnir o.t. um?

ad b
Í 2. pkt. verður "nýggju skrásetingum Toll- og Skattstovunar av ongum" nevnd.

Hvat meinast við hettar? Okkum kunnugt er talan um ta vanligu ognaruppgerðina, sum verður telduskrásett, og eru ikk fleiri upplýsingar í hesi skránni enn á ognaruppgerðini.

ad. e
Í 2. pkt. verður ført fram, at "fyritreytin fyri eini rationellari og effektivari umsiting av pensiónslógunum er, at skattamyndugleikin broytir sín skrásetingarháttan..."

"Neyðugt er í lógini at tryggja, at tann parturin av pensiónsumsitingini, sum hevur við inntøkur at gera, er í lagi. Tí er skotið upp, at Toll- og Skattastovuni verður álagt at syrgja fyri, at hetta verður gjørt."

Sambært § 25, stk. 1 og stk. 5 ásetir landsstýrið nærri reglur fyri útrokning av inntøkugrundarlagi v.m., og

tí eru ongi ítøkiligt krøv/ynski at finna í lógini um, hvussu "skattamyndugleikin" skal broyta sín skrásetingarhátt. Tað er eisini torført við støði í viðmerkingum landsstýrisins til inntøkugrundalagið at finna ítøkiligar ásetingar um, á hvønn hátt Toll- og Skattstova Føroya skal tryggja/syrgja fyri, at upplýsingar um inntøku- og ognarupplýsingar eru "í lagi".

Tað má sigast at vera óvanligt í eini pensiónslóg at áleggja einum øðrum almennum myndugleika at tryggja upplýsingar í "nýtiligum formi" á so leysum grundarlagi. Hvør hevur t.d. ábyrgdina, sum Toll og Skattstova Føroya ikki er før fyri at tryggja umroddu uplýsingar í nýtiligum formi, er tað landsstýrismaðurin í almannamálum ella landsstýrismaðurin í fíggjarmálum.

Ad. 4.7. Ásetan av pensión í sambað við burturgeving, oyðsluandi levnað v.m.

Í 4. pkt. er ásett, at "... forðað verður fyri inntøkuminking orsakað av burturgeving av ognum...".

Orðingin er óheppin, øll hava lógligan rætt til frítt at burturgeva av ognum sínum. Almannastovan kann ikki forða fyri fílíkari inntøkuminking. Mælt verður til at greiða nærri frá hvørjar reglur landsstýrið ætlar at áseta, herundir viðv. sølu til undirprís ella keypi til yvirprís.

3.0 Aðrar lógargreinar

Í § 3, stk. 1, nr. 2 er ásett "...hevur hýru við skipi heimahoyrandi í Føroyum". Mælt verður til at útgreina, hvat "heiamhoyrandi" merkir, og um t.d. skipið skal vera skrásett í Føroyaum.

Mett verður, at tað átti at verið ein neyv úgreining í viðmerkingunum av "bústaðarkravinum" í § 3 og av hvat "búsetast í útlandinum" merkir, og um t.d. treytir eru um, at persónurin skal hava avhendað fasta ogn v.m.

Tað tykist óheppi, at "og" verður nýtt við umskifti ímillum nr. 2 og nr. 3 í § 3, tá hetta kann skiljast sum um allar treytirnar í § 3, stk. 1, nr. 1-3 skulu verða loknar, fyri at vinna rætt til pensión ov avlamisveiting.

Í § 4, stk. a er ásett, at "...rætturin til fulla pensión fyri persónar yvir 67 ár..." í stk. 3 stendur "við 67 ára aldur" og í § 10 "persónar, sum hava fylt 67 ár". Samsvar er ikki ímillum § 4, stk. 1 og hinar báðar ásetingarnar.

Í § 7, nr. 1 er ásett, at "tá ið bústaðartíðin verður gjørd upp.....verður við bústað í danska ríkinum javnsett hýra við føroyskum, grønlendskum ella donskum skipip". "Hýra" tykist ikki verða eitt nóg greitt hugtak at nýta í hesum sambandinum, og mælt verður til at nýta eitt meira eintýdugt hugtak, ella at greiða frá í viðmerkingunum, hvussu hugtakið "hýra" skal tulkast, t.d. við mynstringartíð e.l.

Í § 7, nr. 2 stendur "útsent umboð fyri ein ...almennan myndugleika". Mælt verður til at útgreina, hvat "almennir myndugleikar" fevna um. Merkir hetta landstovnar, ávísar grunnar, kommunalar myndugleikar, interkommunalar osv.

Hvat merkir ásetingin í § 7, nr. 3 "uppihald uttanlands í sambandi við starv í føroyskum....úluga".

Í § 14, nr. 2 verða "... aðrar serligar umstøður..." nevndar. Eingin ábending er í greinini ella í viðmerkingunum um hvørjar umstøður talan kann verða um.

Í § 30, stk. 5 er ásett, at "viðbótin er skattskyldug hjá barninum". § 5, stk. 1 í skattalógini ásetir, at "børn verða sett sjálvstøðugt í skatt av allari inntøku síni, herí eisini av ---- barnaviðbót", og tað í viðmerkingunum til somu grein stendur, at tá talan er um uppihaldspening av ymiskum slag til børn, er hann altíð

skattskyldugar hjá børnunum. Út frá hesum verður mælt til at avklára, hvør hevur rætt til viðbótina sambært § 30, stk. 5 í uppskotinum, um treytirnar fyri viðbót annars eru loknar, pensiónistirnir ella barnið.

Í § 31, stk. 1 verður orðingin "serliga trong kor" nýtt. Eingin ábending er í viðmerkingunum um, nær talan kann verða um serliga trong kor.

Í § 31, stk. 4og 5 er ásett, at **"landsstýrið ásetir nærri reglur".**

Í § 42, stk. 2 er ásett, at **"landsstýrið ásetir nærri reglur".**

Í § 50, stk. 4 er ásett, at **"landsstýrið ásetir nærri reglur".**

Í § 50, stk. 6 er ásett, at **"landsstýrið ásetir nærri reglur".**

Í § 51, stk. 2 er ásett "...hvørs pensión fellur burtur eftir reglunum í § 49, stk. 1 og 5 og § 50, stk. 1 og 4...". Spurt verður um, um allar hesar ásetingarnar skulu verða loknar.

Eingin tulking er av, hvat "eftir umstøðunum" í § 52, stk. 2 merkir.

Eingin ábending er um, hvat "munandi" í § 60, stk. 6 merkir, og eingin ábending er um, hvat "eftirlit" í stk. 7 merkir.

Í § 60, stk. 9 er ásett, at "fyri virksemi sítt eftir hesi lóg fáa limir Ráðsins eina samsýning". Spurt verður um, hvør ásetir hesa samsýning.

Í § 61, stk. 1 er ásett, at **"landsstýrið ásetir nærri reglur".**

Í § 62, stk. 1 er ásett, at **"landsstýrið ásetir nærri reglur".**

Vísandi til § 65 verður mælt til at greiða nágreiniliga frá, hvørja avgerð landsstýrið hevur tikið/ætlar at taka, og á hvønn hátt avgerðin verður almannakunngjørd.

Sambært § 72 fær lógin gildi tann 1. juli 1998. Ígildiskoman er ikki í samsvari við viðmerkingarnar til hesa greinina.

Tann 07. mars 1996

Landsstýrið hevur sent kommununi uppskot til løgtingslóg um sosialar pensiónir og biðið um viðmerkingar kommununar.

Uppskotið hevur ikki fingið politiska viðgerð og eru viðmerkingarnar tí frá umsitingini.

Umsitingin metir lógaruppskotið sum eitt stórt bata bæði fyri brúkaran og umsitingina, men hevur tó nakrar viðmerkingar og uppskot til broytingar.

§ 3 og § 4: Í viðmerkingunum verður sagt, at reglurnar um upptjening o.a. komu í gildi pr. 1. januar 1995 sum tillaging til "Nordisk konvention om social sikring", sum Føroyar hevur samtykt at taka undir við. Men tað eru eisini føroyingar, sum eru búsitandi partar av lívinum í øðrum londum, sum Føroyar ikki hava avtalu við. Hesir kunnu koma ikka fyri, um teir hert hava verið búsitandi í Føroyum t.d. seinastu 20 árini áðrenn pensiónsaldur. Tí eigur á ein ella annan hátt at verða viðmerkt, at ásetningarnar í § 3og 4 bert eru galdandi.

um viðkomandi samstandis hevur rætt til pensión frá øðrum landi, sum avtala er gjørd við. Møguliga eigur eisini at verða álagt umsitingini at hjálpa viðkomandi persóni at fáa ígoldið ta pensión, hann hevur rætt til frá øðrum landi.

§ 23. stk. 3: Tað framgongur ikki nóg greitt av lógartekstinum, at pensiónsviðbótin verður lækkað við grundarlag í inntøkuni hjá b'ðum samlivandi hjúnarfeløgum. Eisini um bert annar hevur rætt til pensión.

§ 24. stk. 1: Sambært galdandi lóg kunnu frá inntøkuni dragast rakstrarútreiðslu, sum eru nýttar til at vinna, tryggja og viðlíkahalda inntøkuna. Henda regla er strikað í uppskotinum við tí grundgeving, at hesin frádráttur er tann sami sum í skattalógini og er lí innbygdur í inntøkugrundarlagið, sum eftir uppskotinum v erður skattskylduga inntøkan.
Sambært uppskotinum verður tað skattskylduga inntøkan uttan skattligar frádráttir, sum verður nýtt sum grundarlag fyri ásetan av pensiónsupphæddini.
Ferðafrádráttur og frádráttur fyri dupult húsarhald. Kunnu hesir frádráttir sammetast við rakstrarútreiðslur, sum eru nýttir til at vinna, tryggja og viðlíkahalda inntøkuna? Um so er, hvussu verður tá møguligt at skilja hesar frá øðrum skattligum frádráttum?

§ 25: Tá reglurnar fyri inntøkujavning nú verða gjørdar einfaldari, hví so halda fram við at gera mun á inntøkum. Kann tað ikki vera líkamikið, hvat slag av eykainntøkum ein pensiónistur hevur. Mælt verður til, at ein eins stórur frádráttur verður gladandi uttan mun til, hvat slag av inntøku talan er um.

§ 29, stk. 3: Sambært galdandi lóg um barnagjøld til einsamallar uppihaldarar v.fl. er normalgjaldið ikki eins fyri móðir sum fyri faðir. Tí eigur lógin at verða orðað soleiðis, at barnaviðbót verður útgoldin við sonnu upphædd sum normalgjaldið fyri ein faðir.

§ 30, stk. 5: Eigur at broytast til: Landstýrið ásetir nærri reglur.....

§ 32 sb. § 69: Óhugsandi er, at nakar persónur fær útgoldið avlamisískoyti, sum verð avloyst av avlamisviðbót, tá pensiónslógirnar vóru broyttar í 1967. Inntøkujavning skuldi undir øllum umstøðum verið óneyðug.

§ 34. stk. 4: Læknaváttanin eigur í øllum førum at verða goldin sum pensiónsútreiðsla. Annars kann vera vandi fyri, at læknin alfrar seg við at skriva váttan, um hann ivast í, hvat úrslitið verður. Eisini kann hugsast, at læknarnir verða meira objektivir í sínum metingum, um teir vita, at teir altíð fáa gjald fyri váttanina.

§ 40, stk. 1: Sambært uppskotinum skal pensiónin nú gjaldast afturút einaferð um mánaðin. Í viðmerkingunum verður sagt, at hetta er samsvarandi ásetingunum í núgaldandi fólka- og avlamispensiónslógum. Hetta man vera ein skrivivilla, tí í § 65. stk. 3. verður ásett, at veitingar eftir teimum lógum, ið verða settar úr gildi við hesari lóg, verða framhaldandi at viðgera sum forút útgoldnar veitingar.

§ 53. stk. 3: Sambært uppskotinum skal í ásetan av pensiónini ein giftur persónur javnsetast við ein einsamallan, um samlívið er slitið við sundurlesing (separatión).
Galdandi siðvenja hevur verið, at tí er sannlíkt, at hjún veruliga liva hvør sær, tó uttan at vera sundurlisin, so hava hesir persónar verið javnsettir við stakar persónar.

Í samband við ein møguligan kommunureform eigur møguleiki at vera fyri at flyta heimildirnar hjá Almannastovuni ella partar av hesum til kommunur at umsita. § 56 eigur tí at fáa eitt stk. 2

§ 56. stk. 2: Landsstýrið kann í samráða við avvarandi kommunu avgera, at heimildirnar hjá Almannastovuni ella partar av teimum kunnu flytast til kommunur at umsita.

§ 59, stk. 11: Ráðið eigur í teimum førum, har einkommuna hevur eina sosiala umsiting, eisini at boða hesari kommunu frá.

Annars tekur umsitingin fult undir við, at lógin ikki eigur at verða sett í gildi, fyrr enn tøkniútgerðin er fult út tillagað og royndarkoyrd, og allar kunngerðir og leiðbeiningar, sum landsstýrið skal gera, eru gjørdar. Hetta er ein avgjørd fyritreyt fyri, at lógin skal virka eftir ætlan.

Vinarliga b.v. Jens M. Poulsen, býráðsskrivari 8. mars 1998

Viðmerkingar til uppskot til løgtingslóg um sostalar pensjónir

Inntøku- og frádráttarupplýsingar

Inntøku- og frádráttarupplýsingarnar eru tær inntøkur og teir frádráttir sum eru á sjálvuppgávuni, og sum samanlagt geva ta skattskyldugu inntøkuna.

Fyribilsskrá/sjálvuppgáva:
Formliga sæð eru upplýsingurnar ikki "bindandi" fyrr enn sjálvuppgávan er latin inn.

A-Inntøkur:
Í inntøkuárinum (fyribilsskattaárinum) verða A-inntøkur ávístar gjøgnum skattaskipanina hvønn gerandisdag í árinum, tá eftir nær arbeiðsgevarin rindar/flytur A-inntøkuna.
A-inntøkur verða defineraðar sum allar tær inntøkur sum kunnu ávísast gjøgnum skattaskipanina: t.v.s. í praksis allar lønarinntøku, allar pensjónsinntøkur og allar aðrar inntøkur sum koma ístaðin fyri lønarinntøkuna t.d. útgjaldingar frá AI.S.
Lønarinntøkur uttanlands eru ikki í øllum førum A-inntøkur, men B-inntøkur.
B-inntøkur verða defineraðar sum inntøkur sum ikki kunnu ávísast gjøgnum skattaskipanina: t.d. inntøka av egnum virki, ávísar løntir og pensjónir uttanlands, vinningsbýti v.m.

Í praksisi merkir hetta, at T&S dagligt hevur eitt dagført yvirlit yvir A-inntøkur útgoldnar í inntøkuárinum. Yvirlitið vísir hvat higartil er útgoldið í árinum og av hvørjum (arbeiðsgevarin). Yvirlitið vísir ikki um talan er um vikuløn, mánaðarløn o.tl., og merkir hetta, at tíðspunktið fyri nær upplýsingarnar verða lisnar út er avgerandi fyri at siggja inntøkuviðurskiftini hjá einum borgara. T.d. um upplýsingarnar verða lisnar út beint áðrenn ella beint aftaná, at mánaðarlønin er flutt gjøgnum skipanina.

B-inntøkur
B-inntøkur í fyribilsskránni eru bert álítandi í tann mun sum skattgjaldarin hevur boðað frá hesum. Tó roynir T&S at gera eina automatiska fyribilsskráseting av hesum út frá teimum tølum sum T&S hevur, m.a. sjálvuppgávan árið fyri.

Frádráttir:
Frádráttir í fyribilsskránni eru bert álítandi í tann mun sum skattgjaldarin hvur boðað frá hesum. Tó roynir T&S at gera eina automatiska fyribilsskráseting av hsum út frá teimum tølum sum T&S hevur, m.a. sjálvuppgávan árið fyri.

Samanumtikið kann sigast, at upplýsingar á sjálvuppgávuni eru álítandi og juridiskt bindandi, og tí beinleiðis kunnu brúkast av øðrum, meðan upplýsingarnar í fyribilsskránni bert kunnu vera vegleiðandi.

Upplýsingarnar á sjálvuppgávuni eru tøkar frá umleið medio apríl árið eftir inntøkuárið. Sjálvstøðugt vinnurekandi skulu lata sjálvuppgávu inn eftir føðingardegi, í seinasti lagi innan 15. august.

Ognarupplýsingar:
Frá og við sjálvuppgávuni 1995 fer T&S partvís at fylla út ognaruppgerðina fyri brogarar.

Finansiel ogn og skuld:

Upplýsingar um ultimo-saldo og ultimo-rentur á inn- og útlán í føroyskum peningastovnum v.m. verða fluttar til T&S medio januar árið eftir.
Hetta merkir at T&S automatiskt hevur upplýsingar til tann partin á ognaruppgerðini sum viðvíkur finansiellari ogn og skuld í føroyskum peningastovnum.
Sigast skal tó, at henda skipan nýliga er komin í gildi, og kann ikki væntast at allar upplýsingar eru nóg góðar fyrr enn um 2-4 ár, m.a. skal P-talið skrásetast á øllum konti í peningastovnunum, og tekur hetta tíð.

Upplýsingar um finansiella ogn og skuld uttanlands hevur T&S ikki fyrr enn borgarin letur inn ognaruppgerðina (samstundis sum sjálvuppgávan skal latast inn). Tó eru ávisar innguleikar fyri at fáa upplýsingar um ogn og skuld í hinum norðurlondunum smb. dupultskattasáttmála.

Fast ogn v.m.
Upplýsingar um fasta ogn hevur T&S bert aftaná at borgarin hevur latið inn ognaruppgerðina.

Inntøkur grein 24,1:

Talan er um inntøkur á sjálvuppgávuni, og kunnu tær uttan víðari flytast Almannastovuni. Treytin er tó, at viðkomandi hevur fingið eina skattauppgerð, t.v.s. at sjálvuppgávan er líknað og góðkend. Líkningararbeiðið fer fram í tíðini mei til oktober árið eftir inntøkuárið.
Sum T&S hevur skilt, er talan bert um bruttoinntøkur: frádráttir á sjálvuppgávuni skulu ikki teljast við. Viðmerkjast skal, at í løtuni eru tveir frádráttir sum eru "fastir", nevniliga frádráttur fyri inngjald til Al.S og frádráttur fyri inngjald til arbeiðsmarknaðarefti rlønargrunnin.

Ognarinntøkur grein 24,2:

Av teimum ognarinntøkum sum nevndar eru í grein 24,2 í lógar-uppskotinum eru bert renteinntøkur í føroyskum peningastovnunum automatiskt tørkar hjá T&S. Hinar ognarinntøkurnar eru bert tøkar í tann mun borgarin hevur upplýst hesar á tí innsendu ognaruppgerðini.

Inntøkur í grein 24,3:

Viðvíkjandi inntøkunum í grein 24,3, hevur T&S ikki beinleiðis tær neyðugu upplýsingar. Treytin er at inntøkurnar verða markaðar, t.d. við at Almannastovan í "løtnarflytingini" beinleiðis marker hvat slag av inntøku talan er um. Hetta kann gerast við at ávísa tær ymisku inntøkur við hvørjum sínum V-talið (arbeiðsgevaratal).
Viðvíkjandi samhaldsfasta so er tað almannastovan og gjaldstovan, sum skulu umsita útjaðingina, og hevur Almannastovan tí sjálv hesar upplýsingar.

Reglur smb. grein 24,5:

Reglurnar mugu ásetast samhært omanfyri standandi.

Forðingar fyrir einum fríum informationsflowi

Helst bert forðingar sum lóggávan setur: løgtingslóg um evnisskrár og lógir innan tey ávísu økini (skattalóg, almannalóg).

T&S hevði tann 5. mars 1996 í øðrum sambandi fund við skrásetingareftirlitið og varð T&S tá gjørt varugt við, at eftir gladandi lóg um evnisskrár hjá almennum myndugleiku, var einki í vegin fyri at T&S letur upplýsingar til t.d. Almannastovuna, men Almannastovan hevur ikki heimild at nýta upplýsingarnar til samkoyring við teirra skrár við hjálp av P-talinum. Í praksis merkir hetta helst, at Almannastovan hevur ikki ehimild at nýta upplýsingarnar beinleiðis við edv-flyting frá T&S við P-talinum.

Kurt Madsen, Regin Thomsen

Viðvíkjandi áður sent skriv um viðmerkingar til uppskot til løgtingslóg um sosialar pensjónir

Aftaná samrøðu við Almannastovuna vil Toll- og Skattstovan gera vart við, at í nevnda skrivi dagfest 6. mars 1996 hevur Toll- og Skattstovan skrivað positivar avmarkingar um havt Toll- og Skattstovan kann lata viðari til Almannastovuna, t.d. verður sagt um ognarinntøkur í føroyskum peningastovnum.

Toll- og Skattstovan hevur sostatt ikki gjørt yvirlit yvir upplýsingar sum Toll- og Skattstovan ikki hevur. Sum dømi um upplýsing sum Toll- og Skattstovan ikki automatiskt hevur tøka eftir galdandi lóggávu, skal nevnast vinningsbýti, sum Almannastovan nevnir sum dømi um eina týðandi upplýsing.

Kurt Madsen, Regin Thomsen

12. mrs. 1996
FL.j.nr. 1015-7/91

Viðv. uppskoti til løgtingslóg um sosialar pensiónir - tygara j. nr. 1015-7/91
Vísandi til skriv tygara, dagfest 4. juni 1997, verður skotið upp, at § 58 í lógaruppskotinum verður orðað soleiðis:

§ 58. Tað er Almannastovuni heimilað at heinta teir upplýsingar, sum Toll- og Skattstova Føroya hevur skrásett um inntøku- og ognarviðurskifti, til viðgerð av pensiónsmálum.
stk. 2. Almannastovan letur Toll- og Skattstovu Føroya upplýsingar, um hvørjir persónar hava rætt til skattafrádrátt, smb. § 3 í løgtingslóg um áseting av skatti til landskassan.

Viðmerkingar til stk. 1
Við hesum uppskoti er lagt upp til, at Almannastovan til eina og hvørja tíð kann heinta teir upplýsingar, sum Almannastovan metir skulu brúkast, til viðgerðina av pensiónsmálum, og at tað er Almannastovan, sum hevur ábyrgdina av, at viðari viðgera upplýsingarnar eftir lóg um sosialar pensiónir. - Toll- og Skattstova Føroya skal ikki vera við í hesi viðgerð.

Orðingin hevur eisini við sær, at Almannastovan bert kann fáa teir upplýsingar, ið eru skrásettir hjá Toll- og Skattstovu Føroya. Orðingin í uppskotinum frá 28. februar 1997 kundi tulkast soleiðis, at Toll- og Skattstovu Føroya. Orðingin í uppskotinum frá 28. februar 1997 kundi tulkast soleiðis, at Toll- og Skattstovu Føroya varð álagt, at fáa tilvega upplýsingar, sum ikki frammanundan eru skrásettir hjá Toll- og Skattstovu Føroya, og sum ikki verða brúktir av skattaumsitingini, men sum umvent hava serliga áhuga hjá pensiónsumsitingini.

Toll- og Skattstova Føroya hevur í broytingaruppskotinum lagt upp til, at kostnaðurin av pensiónslógini er Toll- og Skattstovuni óviðkomandi. Lagt er upp til, at Almannastovan kann fáa teir upplýsingar, ið Toll- og Skattstova Føroya hevur skrásett, uttan at hetta skal tyngja tíggjaraetlan stovnsins. - Hetta er eisini í tráð við gongdina innan flytting av edv-upplýsingum: Í staðin fyri, at Toll- og Skattstovuni verður álagt at sjóða upplýsingar saman, so verða uppýsingarnir lagdir í eitt "datavøruhús", har viðkomandi brúkari kann heinta teir upplýsingar, ið hann hevur brúk fyri.

Viðmerkingar til stk. 2
Sum er, hevur Toll- og Skattstova Føroya bert møguleika at áseta skattafrádráttin hjá persónum, sum lúka treytirnar í § 10 í lóg um sosialar pensiónir (67 ár - fólkapensión). Aðrir persónar, ið hava rætt til frádráttin, kann Toll- og Skattstova Føroyar bert skráseta eftir fráboðan frá Almannastovuni.

Til almennu viðmerkingar landstýrisins pkt. 4.6 ad c er at viðmerkja, at tað helst ikki er rætt, at áleggja Toll- og Skattstovuni at syrgja fyri, at ymisk sløg av inntøkum verða útvíst fyri seg. Arbeiðið hesum viðvíkjandi

liggur úti hjá viðkomandi lønávísara, og hevði tða verið tryggjað hjá Toll- og Skattstovuni - við veruligi lóggávu - at kravt hetta av lønávísaranum; kanska serliga, tá hugsað verður um, at hetta ikki hevði verið gjørt av skattligum orsøkum, men hartilfarsmóti av pensiónsorsøkum.

Vinarliga Toll- og Skattstova Føroya, Stýrið, Lógardeildin, Jákup Eyðfinn Kjærbo, deildarstjóri

14. aug. 1997
F.L.j.nr. 1015-7/91

Við skrivi dagfest 16. februar 1996 (j.nr. 1015-7/91) hevur landsstýrið sent ráðnum útkast til uppskot til løgtingslóg um sosialar pensjónir.

Málið hevur verið viðgjørt á fundi í ráðnum tann 29. februar 1996, har samtykt varð at svara, at ráðið fyri sítt viðkomandi ikki hevur viðmerkingar til fyriliggjandi uppskot. Tó heldur ráðið, at verandi Kærunevnd í Almannamálum ikki hevur neyðugar fortreytir fyri at virka sum kærustovnur í tiernum málum, sum í løtuni verða viðgjørd av ráðnum, og kann tí ikki mæla til, at heimildin hjá Den Sociale Ankestyrelse sum er verður flutt til Kærunevndina í Almannamálum samsvarar grein 55, 4. stk., í uppskotinum.

Joen H. Andreassen

7 mrs. 1996 F.L.j.nr. 1015-7/91

VIÐVÍKJANDI LÓGARUPPSKOTINUM UM SOSIALAR PENSJÓNIR

Ráðið hevur móttikið bræv tykkara tann 21. februar, sum hevur n.nr. 1015-7/91 dagfest 16. februar 1996.

Tað er gott at hetta uppskot er komið so mikið langt, at tað er komi til ummælis hjá ymiskum felagum.

Men tað má sigast vit tað sama, at tíðarfreistina sum vit hava fingið at gjøgnumganga allar hesar 72 síðurnar í, og gera viðmerkingar til, tað sær ráðið sær ikki ført fyri.

Ráðið hevur glett seg til at fingið hetta lógaruppskot, sum hevur tikið so langa tíð at evna til, til ummælis, - men nú til onga nýtslu. - Í norðurlondum, serliga Danmark, tók tað fleiri ár at smíðja eina slíka lóg. So má tað jú taka nakað av tíð at umhugsa tær, og samanlíkna tær, við tær gomlu, til at ummæla.

Ráðið yvast onga løtu í, at tey fólk sum hava tilevna hetta lógaruppskot, hava gjørt eitt stórt arbeiði. Og hava vilja gjørt tað so væl sum tað nú einafer kann læta seg gera. Tað eiga tey tøkk fyri.

Men har fyri er tað ikki vist, at ikki ókkurt felag kundi komi við einum ella øðrum góðum broytingaruppskoti til onkra grein, - ella ískoyti. - Ráðið vil ikki gera nakrar viðmerkingingar einans fyri at gera teir. Um Eldraráðið í framtíðini kemur út fyri at ummæla mál, og/ella lógaruppskot, so vil ráðið altíð geva eina gjølla grundgeving fyri tí. Tað er okkara vón, at í framtíðini fáa felagini í minsta lagi 30 arbeiðsdagar í staðin fyri nú 9 dagar, at viðgera møgulig mál. Tað kann hugsast at ráðið kemur við onkrum uppskoti til broyting av onkrari grein, tá ið lógin hevur staðið sína roynd í eitt hella tvey ár.

Sagt verður frá hesum.
Vinarliga, f. Eldraráðið, Símun P. Poulsen, formaður

6 mars. 1996 F.L.j.nr. 1015-7/91

Viðvíkjandi viðmerkingum til lógaruppskot um sosialar pensjónir

Vísandi til brævv frá 16.02.1996 j.nr. 1015-7/91 hevur Ráðið hesar viðmerkingar:

Ráðið fyri brekuð gleðist yvir, at tað nú er komið so langt við arbeiðinum, at hetta uppskot hevur sæð dagsins ljós. Ráðið hevur hjá landsstýrinum eftirlýst hesum uppskoti ella intensjónunum við tí, líka síðani ráðið varð sett á stovn. Tað hevur lætt um, at viðmerkingar og fylgjuskjøl hesaferð eru við frá landsstýrinum.

Ásannast má tó, at tíðarfreistin, við hava at viðgera uppskotið í, er alt ov stutt, ja púra burturvið. Við tað, at ráðið, ið er óløgt, hvørki hevur umstøður, møguleika ella orku til at geva uppskotinum nevyðugu viðgerðina, fara vit at biðja um, at freistin verður longd.

Eitt samt ráð er vónbrottið yvir hesa byrjan - skulu vit vænta somu framferð, tá fylgjandi lógir fara at koma? Verður hetta mannagongdin, eru vit skuffað.

Ráðið býtti seg í tveir bólkar. Tann eini helt, at vit ikki áttu at viðgera uppskotið undir trýsti. Hein parturin helt, at vit áttu at peika á tetr veikleikar, sum vóru eyðsýndir. Úr landsstýrinum hevur verið ført fram, at arbeitt hevur verið undir stórum tíðarpressi - gaman í, men mark er fyri, hava ein eigur at lata sær lynda, í Danmark tók tað 9 ár at smíða líknandi lóg.

Ráðið er farið undir viðgerðina og vil draga hesi viðurskifti fram. Tað fyrsta ein bítur merki í er, at lógin í øll ov stóran mun er ein beinleiðis umseting úr donskum, heldur enn ein uppruna føroysk lóg lagað til føroyskan hugburð og viðurskiftini í landinum annars. Tað kann staðfestast, at pensionistar í Føroyum eru verri fyri enn teirra líkar í grannalondunum, serliga Danmark.

Viðmerkingar til grein 2, 1. stk. Tá hetta er uppskot um føroyska løgtingslóg, meta vit tað verða rættast, at 1. og 2. pettið verðu býtt um, soleiðis: at hann, ið fær veiting, hevur fastan bústað í Føroyum ella hevur býru við skipi heimahoyrandi í Føroyum, verður 1. petti.

Viðmerkingar til grein 10 til og við 13.
Ráðið tekur undir við hugsanini um ikki at gera børn til pensionistar. Men gloppið frá 15 ár til 18 ár er ov langt. Hesi árini eru eitt tíðarbil, her ung fólk í stóran mun sjálvi skaffa sær inntøkur til úvís ting, sum hevur teirra áhuga, henda møguleika hava brekað ungfólk ikki. Ráðið mælir tí til, at ung millum 15 - 18 ár hava møgleika fyri at fáa eina fyribilspensión, til tey fáa eitt veruligt undur- ella úthúgvingartilboð.

Viðmerkingar til grein 29 um barnaviðhót. Tað tykist óneitvíst, at ein pensionistur fær útgoldið barnaviðbót meðan hon/hann er gift/ur, meðan stakir uppihaldarar eftir stk. 4 í greinini missa barnaviðbótina. Vit vita, at hesar reglur eru galdandi í Danmark, men har kunnu stakri uppihaldarar fáa móvirði samsvart reglunum í **børnetilskudsloven.**

Viðmerkingar til grein 30 um persónliga viðbó. Útreiðslur til egnan bústað eru ivaleyst størstu trupulleikarnir hjá pensionistum við lítlari inntøku. Eistni her kundu vil yvirskuggja okkum at gjørt verður sum í Danmark, har tey hava sertigar reglur viðvíkjandi útreiðslum til egnan bústað.

Viðmerkingar til grein 48 og 49. Greinarnar eru so langar og torskildar, at neyðugt er at fara í viðmerkingarnar fyri at skilja hvat meint verður við. Lógargreinar eiga at vera so greiðar, at ein og hvør kann lesa seg fram til, hvat meint verður við. Ráðið metir annars, at allir pensionistar eiga at fáa pensjónina útgoldna. Teir gjalda síðani fyri seg eftir reglum, ið landsstýrið ásetir.

Viðmerkingar til grein 54 og 55. Rættartrygdin hjá borgarunum er í vandu, tá ein óheftur kærustovnum ikki fæst at virka. Ráðið heitur tí á landsstýrið um at fáa sett tey fólk, ið eru neyðug fyri, at ein óhefti

kærunevndin kann virka. Ráðið kann tí bert taka undir við **grein 55 stk 4,** tá hesi viðurskifti eru fingin í rættlag.

Viðmerkingar til grein 61 stk. 2. Í einum tilfari ráði skulu brúkaraumboð sita, eins og tað nú eru fólkavald í Vanlukkutryggingarráðnum.

Viðmerkingar til grein 71. Ráðið tekur undir við viðmerkingunum til grein 71 um, at tøkniútgerðin er royndarkoyrd, og at allar kunngerðir og reglugerðir, ið landsstýrið skal gera, eru gjørdar, áðrenn lógin kemur í gildi.

R.v. Jens Jensen, formaður

6 mars 1996 EL.j.nr. 1015-7/91

Viðv: Uppskot til lóg um socialar pensjónir, Jur. 1015-7/91

Lógin viðvíkur kommununum ógvuliga lítið - leikluturin hjá kommununum minkar eftir øllum at døma í uppskotinum.

Tá hugsað verður um, at ein av orsøkunum til lógina er, at danski staturin í 1993 krevur at refusionirnar til sociala økið verða broyttar til blokktilskot, er tað løgið at kommununar sambært § 62 framvegis skulu veita refusion til landskassan.

Henda refusionin virkar á mangan hátt uppá sama máta sum pensionsgjaldið uppá 2,5%, ið var lagt á hvønn skattgjaldara, og var tikið burtur í 1970. Tá kommunuskatturin er linierur virkar kommunala refusionin sum eitt % gjald, ið er lagt á hvønn skattaborgara.

Skal stigið verð atikið fult út, eigur hendan seinasta leivdin frá tíðini, her tað ráðd um at skifta útreiðslurnar millum so nógvar kassar sum gjørlig, at verð tikin brutur.

Kommununar bera seg ikki undan at hjálpa til har tær kunna í umsitinigini av almannamálum, men beinleiðis at gjalda aftur fyri at veita lucsa hjálp, halda vit vera órímiligt. Tí mæla vit til at hetta gjaldið fellur burtur sum skjótast.

fyri felagið Sveiney Sverrisdóttir, skr.

1. viðgerð týsdagin 17. februar 1998. Uppskotið varð heint í trivnaðarnevndina.

Málið fall burtur sbr. stýrisskipanarlógini § 15 stk. 3, tí at løgtingsval var 30. apríl 1998, og málið ikki var liðugt viðgjørt á tingi fyri valið.

F.L.j.nr. 1015-7/91

71 Uppskot til løgtingslóg um arbeiðsumhvørvi

Á 1998, fríggjadagin 13. februar legði Kristian Magnussen, landsstýrismaður, vegna Fíggjarmálaráðið fram soljóðandi

Uppskot
til
løgtingslóg um arbeiðsumhvørvi

KAPITTUL 1
Endamál og øki

§ 1. Endamálið við lógini er at:

1) virka fyri einum tryggum og heilsugóðum arbeiðsumhvørvi, sum altíð er í samljóð við tekniskan og sosialan gongdina í samfelagnum, og
2) skapa grundarlag fyri, at virkini sjálvi kunnu loysa teirra trygdar- og heilsuspurningar, við vegleiðing og í samstarvi við felagini á arbeiðsmarknaðinum, og við vegleiðing og eftirliti av Arbeiðseftirlitinum.

§ 2. Henda lóg fevnir um arbeiði fyri arbeiðsgevara.

Stk. 2. Undantikið er:

1) arbeiði í privata húsabaldi arbeiðsgevarans,
2) arbeiði, sum einans verður avrikað av limum í húsi arbeiðsgevarans, og sum hoyra til húskið, samanber tó § 48, stk. 1, 2. pkt.
3) veiða og fiskiskapur,

Stk. 3. Niðanfyri nevndu reglur fevna eisini um arbeiði, sum ikki verður gjørt fyri ein arbeiðsgevara, og tey arbeiði, sum nevnd eru í stk. 2, nr. 1-3:

1) § 16 um fleiri arbeiðsgevarar v.m., sum eru á sama arbeiðsplássi, §§ 26-32 um útvegarafyritøkur o.a. og um arbeiðslakarar o.a. og § 33 um byggibarrar v.m..
2) §§ 34-35 um útiman av arbeiði,
3) §§ 38-39 um teknisk hjálpartól,
4) §§ 40-41 um evni og tilfar,
5) § 48, stk. 2 um ov ungan aldur, tá tað snýr seg um vandamikið arbeiði.

§ 3. Lógin hevur bert gildi fyri loftferðsluna, tá talan er um arbeiði á landi.

Stk. 2. Lógin hevur bert gildi fyri sjóvinnu og fiskivinnu í niðanfyri nevndu førum:

1) Ferming og lossing av skipum, eisini fiskiskipum.
2) Arbeiði hjá fyritøkum umborð á skipum, eisini fiskiskipum.

KAPITTUL 2
Trygdar- og heilsulig tiltøk á virkjum
Persónligt samband

§ 4. Á virkjum, har 1-9 fólk eru í arbeiði, eigur arbeiðið hjá virkinum, viðvíkjandi trygd og heilsu, at fara fram soleiðis, at mest møguligt persónligt samband er millum arbeiðsgevaran og tøkuligar arbeiðsleiðarar, sbr. § 20, og hini arbeiðsfólkini. Landsstýrismaðurin í arbeiðsmarknaðarmálum kann tó gera reglur um bygnaðin av einari trygdarskipan, har hetta verður hildið at vera neyðugt.

Trygdarskipanin

§ 5. Á virkjum, har 10 ella fleiri fólk arbeiða, skal arbeiðið hjá virkinum, viðvíkjandi trygd og heilsu, samskipast.

Stk. 2. Arbeiðsleiðarin fyri einum virkisøki skal saman við einum trygdarumboði skipa ein trygdarbólk fyri tað ávísa arbeiðsøki.

Stk. 3. Har ein álitisfólk er valt, kann hesin samstundis verða trygdarumboð. Eru fleiri álitisfólk innan sama øki, kunna hesi sínámillum velja eitt trygdarumboð. Í øðrum førum velja starvsfólkini eitt trygdarumboð fyri hvørt arbeiðsleiðaraøki, til at virka í trygdarbólkinum. Trygdarumboðið umbodar arbeiðsfólkið í spurningum, sum viðvíkja trygdar- og heilsuviðurskiftum teirra.

Stk. 4. Tey arbeiðsleiðaraøki, sum hava bert fá arbeiðsfólk, ella hava bert fá arbeiðsumhvørvislig vandamál, kunnu frá Arbeiðseftirlitinum fáa undantak frá kravinum um serligar trygdarbólkar.

§ 6. Á virkjum, sum hava 20 arbeiðarar ella fleiri, skal trygdarnevnd skipast. Á virkjum, har ein ella tveir trygdarbólkar eru, skulu limirnir í hesum bólki ella bólkum, saman við arbeiðsgevaranum ella einum umboði fyri hendan, ið hevur ábyrgdina av virkinum, skipa trygdarnevndina, soleiðis at nevndin á virkjum við einum trygdarbólki ber 3 limir, og á virkjum við tveimum bólkum fáa 5 limir. Á virkjum, har fleiri enn tveir trygdarbólkar eru, velja trygdarumboðini sínámillum 2 limir og arbeiðsleiðarnir sínámillum 2 limir. Hesir 4 limirnir skulu so saman við

arbeiðsgevarunum ella einum umboði fyri hendan, ið hevur ábyrgdina av virkinum, skipa trygdarnevndina, sum soleiðis fær 5 limir. Trygdarnevndin skal fyriskipa, leiða, ráðgeva, kunna og hava eftirlit við tí trygdar- og heilsuliga arbeiðinum á virkinum.
Stk. 2. Eftirlitsmaðurin hjá Arbeiðseftirlitinum skal, tá hann vitjar virkið, hava samband við leiðsluna á virkinum, trygdarumboðini á staðnum, trygdarbólkarnar og umboð fyri trygdarnevndina. Tey ymsu trygdarumboðini skulu hava loyvi til at leggja fyri eftirlitsmannin hjá Arbeiðseftirlitinum allar teir spurningar, sum hava týðning fyri trygdina og heilsuumstøðurnar á virkinum.

§ 7. Landsstýrismaðurin í arbeiðsmarknaðarmálum kann áseta nærri reglur um bygnaðin og virksemi hjá virkinum, viðvíkjandi arbeiði innan trygd og fyribyrging av heilsuvandum, t.d. reglur um:
1) val av trygdarumboðum,
2) rættindir og skyldur hjá trygdarumboðunum,
3) stovnan av trygdarbólkum og trygdarnevndum, og arbeiðsøkjum teirra,
4) útbúgving hjá limunum í trygdarskipanini,
5) ta dagligu leiðsluna av trygdararbeiðinum.

Stk. 2. Fyri tey arbeiði, arbeiðsøki ella arbeiðspláss, har tað verður hildið at vera óneyðugt at hava trygdararbeiði, samhært hesi lóg, er heimilað landsstýrinum at gera frávík frá reglunum í hesi lóg, ella at laga tær eftir teimum serligu viðurskiftunum.

§ 8. Arbeiðsgevarin skal síggja til, at seti verður av, ein eftir viðurskiftunum, rímilig tíð til limirnar í trygdarbólkinum og trygdarnevndunum til at røkja skyldur sínar í trygdararbeiðnum.
Stk. 2. Arbeiðsgevarin skal syrgja fyri, at limirnir í trygdarbólkunum og trygdarnevndunum fáa høvi til at fáa neyðuga vitan og útbúgving í trygdarspurningum.
Stk. 3. Arbeiðsgevarin skal geva trygdarbólkunum/trygdarnevndunum høvi til at luttaka í teimum ráðleggingum, sum viðvíkja trygdini/heilsuumstøðunum á arbeiðsplássinum.
Stk. 4. Á virkjum, har tað sambært § 5, eru ein ella fleiri trygdarbólkar, men ongar trygdarnevndir, sambært § 6, skal arbeiðsgevarin síggja til, at tey verkevni, sum viðvíkja trygdarnevndini, verða væl og virðiliga røkt í samstarvi við trygdarbólkin/bólkarnar.

§ 9. Arbeiðsgevarin ber útreiðslurnar, ið standast av virksemi trygdarumboðsins, og rindar hesum fyri missi av inntøku, eisini tá tað snýr seg um inntøkumiss í samband við neyðuga luttøku á trygdarskeiðum o.ø. Sama er galdandi fyri arbeiðsleiðaran, tá hesin luttekur á fyriskipaðum trygdarskeiðum v.m.
Stk. 2. Landsstýrismaðurin í arbeiðsmarknaðarmálum kann áseta nærri reglur um, at landskassin letur tilskot til alla og/ella partvísa gjalding av teimum útreiðslum, ið stava frá útbúgving av limum í trygdarskipanini.
Stk. 3. Limirnir í trygdarskipanini eru vardir ímóti uppsøgn og aðrari skerjan av viðurskiftum teirra, á sama hátt sum álitisumboð og lutsmenn teirra eru tað innan teirra fakliga arbeiðsøki. Eisini skal arbeiðsgevarin minst eina viku, áðrenn limur í trygdarskipanini verður uppsagdur, kunna Arbeiðseftirlitið, soleiðis at Arbeiðseftirlitið hevur møguleika at kanna viðurskiftini í samband við uppsøgnina.
Stk. 4. Verður ósemja um tey í stk. 1. og 3. nevndu viðurskifti, t.d. spurningin um hvørjar reglur skulu nýtast, ella um brot á og tulking av reglunum, so skulu hesar avgerast á fakligan háttur ella, um hetta ikki letur seg gera, av rættinum.

§ 10. Landsstýrismaðurin í arbeiðsmarknaðarmálum kann áseta nærri reglur um, at virkir skulu síggja til, at fólin verður sakkøn hjálp, sum í samband við trygdararbeiði, skal ganga til handa, tá viðurskiftini fyri trygdini ella heilsuni hjá starvsfólkunum tala fyri hesum.

KAPITTUL 3
Vanligar reglur
Arbeiðsgevarin

§ 11. Arbeiðsgevarin skal síggja til, at arbeiðsviðurskiftini, viðvíkjandi trygd og heilsu, eru góð. Í hesum sambandi verður serliga víst til:
1) Kapittul 4, um útinnan av arbeiðinum.
2) Kapittul 5, um arbeiðsplássið.
3) Kapittul 6, um teknisk hjálpartól.
4) Kapittul 7, um evnir og tilfar.

§ 12. Á virkjum og arbeiðsplássum, sum eru undir hesi lóg, skulu eftir Arbeiðseftirlitsins metan vera tørvandi ráð til hendis til fyrstuhjálp í vanlukkutilburði, eins og eftirlitið kann treyta tilgerð av serstakari skaðastovu á størri virkjum, um mett verður, at tørvur er á luesum.
Stk. 2. Á arbeiðsplássum har fleiri enn 20 fólk starvast, kann Arbeiðseftirlitið krevja, at góðkendar hørur eru til taks, og at minst eitt fólk hevur tikið eitt av Arbeiðseftirlitinum góðkent skeið í fyrstuhjálp.

§ 13. Arbeiðsgevarin skal við leiðbeining og gjølla eftirliti vissa seg um, at arbeiðið við atlit til skaða- og heilsuvanda verður gjørt fult forsvarliga.

§ 14. Arbeiðsgevarin skal kunna arbeiðsfólkið um teir vanlukku- og heilsuvandar, sum møguliga eru tengdir at arbeiði teirra.
Stk. 2. Arbeiðsgevarin skal eisini syrgja fyri, at arbeiðsfólkið fær neyðuga upplæring og leiðbeining í at gera arbeiðið so vandaleyst, sum yvirhøvur gjørligt.
Stk. 3. Landsstýrismaðurin í arbeiðsmarknaðarmálum kann áseta nærri reglur um skyldur arbeiðsgevarans, sambært stk. 1 og 2.

§ 15. Arbeiðsgevarin skal syrgja fyri, at samstarv um trygd og heilsu verður framt, sambært ásetingum í kapittli 2, og skal hann eisini luttaka í samstarvinum.

§ 16. Hava fleiri arbeiðsgevarar arbeiðið um hendi, og fer hetta fram á sama arbeiðsplássi, skulu øll, sum starvast á slíkum arbeiðsplássi, samstarva um at skapa trygg og heilsugóð arbeiðsviðurskiftir fyri øll, ið starvast her.
Stk. 2. Landsstýrismaðurin í arbeiðsmarknaðarmálum kann áseta nærri reglur um frammanfyri nevnda samstarv.

§ 17. Arbeiðsgevarin hevur skyldu til at kunna trygdarumboðini og álitisfólkini, innan viðkomandi arbeiðsøki, um tey boð, sum Arbeiðseftirlitið, ella tann í § 56 nevndi myndugleiki ella stovnur, skrivliga hevur fyrisett. Somu skyldu hevur arbeiðsgevarin fyri hinum trygdarumboðum ella álitisfólkum, sum ynskja at fáa kunnleika til tey givnu boðini.
Stk. 2. Eru hvørki trygdarumboð ella álitisfólk á eintum arbeiðsplássi, skulu tey, sum arbeiða á nevndu virkjum, vera kunnað um tey boð, sum umrødd eru í stk. 1, 1. pkt.

§ 18. Tá Arbeiðseftirlitið krevur tað, ella um viðurskiftini annars tala fyri tí, skal arbeiðsgevarin seta í verk kanningar, roynslir og ástaðareftirlit, og møguliga boðsenda sakkønari hjálp, fyri at tryggja sær, at arbeiðsviðurskiftini, viðvíkjandi trygd og heilsu eru fullgóð.
Stk. 2. Arbeiðseftirlitið kann til hugfrøðisliga nýtslu, krevja upplýsingar frá arbeiðsgevara um viðurskiftir, sum hava arbeiðsumhvørvisligan týðning. Í teimum førum, har hesi hagtøl verða almennakunngjørd, mugu nøvn ella fyritøkur ikki nevnast.

§ 19. Ásetingarnar í hesi lóg um arbeiðsgevarans skyldur eru eisini galdandi fyri tann, sum leiðir ella luttekur í leiðslu virkisins.

Arbeiðsleiðarin

§ 20. Við arbeiðsleiðara er at skilja hann/hon, hvørs arbeiði bert ella fyri størstan partin er, arbeiðsgevarans vegna, at leiða og hava eftirlit við arbeiðnum á virkinum, ella portum av hesum.

§ 21. Arbeiðsleiðarin skal virka fyri, at arbeiðsviðurskiftini á hansara øki eru fuh forsvarlig, viðvíkjandi trygd og heilsu. Arbeiðsleiðarin skal eisini síggja til, at tey tiltøk, sum gjørd vera við tí fyri eyga, at bøta um trygdar- og heilsuviðurskiftini á arbeiðsplássinum, virka eftir ætlan.
Stk. 2. Verður ein arbeiðsleiðari varugur við trot ella brek, sum kunna føra til vanlukkutilburðir ella sjúku hjá arbeiðsfólkunum, skal hann beinanvegin síggja til, at neyðug tiltøk verða framd fyri at forða fyri, at vanlukka ella sjúka stendst av hesum. Fær hann ikki fornur fyri beinanvegin at seta hesi tiltøk í verk, skal hann beinanvegin siga arbeiðsgevaranum frá hesum vandamáli.

§ 22. Arbeiðsleiðarin skal luttaka í samstarvinum um trygd og heilsu, sum ásett í kapittul 2, §§ 16 og 33.

Starvsfólk

§ 23. Arbeiðsfólkið skal virka fyri, at arbeiðsviðurskiftini, viðvíkjandi trygd og heilsu eru fult forsvarlig innan teirra arbeiðsøki, íroknað tey tiltøk, sum verða gjørd fyri at fremja trygdina og heilsuna, virka sum ætlað.
Stk. 2. Verður arbeiðsfólk varug við brek ella trot, sum kann vera til vanda fyri trygdina ella heilsuna, og sum tey sjálvi eru ikki før fyri at bøta um, skulu tey beinanvegin boða trygdarbólkinum, arbeiðsleiðaranum ella arbeiðsgevaranum frá.
Stk. 3. Har tað vegna útinnan av einum arbeiði, eitt nú umvæling ella umsiting, fyribils er neyðugt at taka burtur trygdartiltøk, skal ansast eftir, at hetta ella hesi tiltøk verða sett aftur uppá plass, beinanvegin umrødda arbeiði er liðugt, ella at eins góð verndartiltøk verða gjørd.

§ 24. Arbeiðsfólkini skulu luttaka í samstarvi um trygd og heilsu, sum hetta er ásett í kapittul 2.

§ 25. Tey, sum hava starv sítt á einum arbeiðsplássi, har fleiri arbeiðsgevarar hava tey ymisku arbeiðini

um hendi, skulu geva seg undir tær reglur, sum eru galdandi fyri samstarv hjá virkjunum, samanber §§ 16 og 33, umframt tær reglur, ið fevna um tað arbeiði, tey skulu útinna.

Stk. 2. Tey, sum arbeiða á økinum hjá einum fremmandum virki, skulu geva seg undir tær reglur um trygd og heilsu, sum galdandi eru fyri nevnda virki, umframt tær reglur, ið fevna um tað arbeiði, tey skulu útinna.

Útvegarar, innleggjarar, umvælarar, ráðleggjarar o.a.

§ 26. Tann sum selur, útleigar, gevur ella synir fram maskinur, maskinlutir, íløt, lutvist tilvirkaðar konstruktiónir, tól, amboð ella onnur teknisk hjálpartól, skal síggja til, at nevndu lutir, tá teir verða útflyggjaðir til nýtslu ella verða vístir fram, verða útgjørdir við neyðugum trygdarútbúnaði, og kunnu nýtast til tað, teir eru ætlaðir, uttan at vera vandamiklir fyri trygdina ella heilsuna, sambært kapittul 6. Neyðugar og lætt skiljandi leiðbeiningar um nýtslu, umsiting, flutning og uppseting skulu fylgja við, tá lutirnir verða útflyggjaðir.

Stk. 2. Verða líðug teknisk hjálpartól útflyggjaði, latin til sølu, útleigað ella útlánt, galda somu skyldur, sum omanfyri eru nevndar.

Stk. 3. Tá Arbeiðseftirlitið krevur tað, ella viðurskiftini gera tað neyðugt, skal innflytarin ella framleiðarin síggja til, at kanningar, royndir og syningar verða gjørdar av sakkønum persóni, fyri at staðfesta, at tað tekniska hjálpartólið er fult forsvarligt, viðvíkjandi trygd og heilsu.

Stk. 4. Tá Arbeiðseftirlitið krevur tað, skal innflytarin ella framleiðarin upplýsa, um tær seldu nøgdirnar av einum tekniskum hjálpartóli kunnu hava við sær vandar fyri trygd og heilsu.

§ 27. Allar maskinur, sum verða útflyggjaðar ella sýndar fram í Føroyum, skulu vera merktar við navninum á framleiðaranum. Verða maskinurnar innfluttar, skal navn og bústaður innflytarans ella annað frámerki standa á maskinunum, soleiðis at eingin ivi er um, hvør er framleiðari ella innflytari.

§ 28. Tann, sum í sjálvstøðugari vinnu innleggur, umbyggir ella umvælir eitt teknisk hjálpartól, skal ansa eftir, at trygdartreytirnar og trygdarávísingarnar, sum eru galdandi fyri hjálpartólið, eru fylgdar.

Stk. 2. Um ein umvæling bert fevnir um ein ella nakrar partar av tí tóli, sum verður umvælt, skal umvælarin ansa eftir, at trygdartreytirnar og trygdarávísingarnar fyri hendan part/partar verða fylgdar. Verður umvælarin í hesum arbeiði vartugur við onnur brek og trot, sum hava trygdarligan týdning, skal hann gera eigaran, ella brúkaran kunnugan við hetta.

§ 29. Tann, sum letur frá sær eina verkætlan um eitt teknisk hjálpartól, framleiðsluútbúnað, byggi- ella útbúnaðararbeiði, skal í ætlanum sínum taka fyrilit viðvíkjandi trygd og heilsu, tá arbeiðið verður gjørt, og viðvíkjandi rakstrinum av lidna bygningínum ella útbúnaðinum. Hetta hevur eisini gildi fyri tann ella teir, ið hava eftirlit við eini slíkari verkætlan, ella sum ráðgeva um viðurskiftir innan arbeiðsumhvørvi.

§ 30. Reglurnar í §§ 26, 27, 29 og 31, stk. 2 hava eisini gildi fyri útvegarar o.a., av evnum og tilfari við egnleikum, ið kunnu vera vandamikil fyri trygdina og heilsuna.

§ 31. Landsstýrismaðurin í arbeiðsmarknaðarmálum kann áseta nærri reglur um tey í §§ 26-30 umrøddu viðurskiftir. Reglurnar í §§ 26-30 frítaka ikki brúkaran fyri skyldur eftir tøkini.

§ 32. Eru serlig viðurskifti, kann Landsstýrismaðurin í arbeiðsmarknaðarmálum áseta reglur ella fremja avgerðir, sum víkja frá kravtunum í grein 26-30. Slíkar avgerðir kunnu eisini í ávísum førum, um serlig viðurskiftir tala fyri tí, takast av Arbeiðseftirlitinum.

Byggiharrar

§ 33. Í byggi- ella øðrum útbúnaðarvirksemi, har meira enn 10 persónar starvast, skal byggiharrin ella hann, ið byggiharrin setur til tess, samskipa tey tiltøk, ið kunnu fremja trygdina og heilsuviðurskiftini hjá teimum, ið starvast á byggiplássinum hjá teimum ymsu arbeiðsgevarunum.

Stk. 2. Landsstýrismaðurin í arbeiðsmarknaðar- málum kann áseta nærri reglur hesum viðvíkjandi.

KAPITTUL 4
Útinnan av arbeiðnum

§ 34. Arbeiðið skal skipast, leggjast til rættis og gerast soleiðis, at tað við atliti til trygd og heilsu er fult forsvarligt.

Stk. 2. Ódømdir fyrimyndir og aðalkrøv, sum hava trygdar- ella heilsuligan týdning, skulu fylgjast.

§ 35. Landsstýrismaðurin í arbeiðsmarknaðarmálum kann áseta nærri reglur um tey krøv, sum skulu vera lokin, fyri at eitt arbeiði kann metast fult út ráðiligt,

tilætlað, skipað og gjørt, herundir um:

1) tiltøk, ella møguligt hann, móti serliga vandamiklum arbeiði, arbeiðsgerðir og arbeiðshættir.
2) persónligar verndarlutir og serlig arbeiðsklæðir,
3) at tey arbeiði, sum hava við sær stóran vanda fyri vanlukkum ella sjúkum, herundir spreingiarbeiði v.m., bert mugu gerast av persónum, sum hava prógv fyri, at teir hava eina nærri ásetta útbúgving, ella hava staðið roynd,
4) at har, sum umstøðurnar vegna trygd og heilsu krevja tað, skulu skipanir fyri arbeiðsgongdina, arbeiðsætlanir, og arbeiðshættir gerast, og at slíkar skipanir og broytingar av hesum, skulu leggjast fyri Arbeiðseftirlitið til ummælis ella góðkenningar, áðrenn tær verða settar í verk.

Stk. 2. Í nevndu reglum kunnu nýtast ávísingar til reglur og fyrisett mát, tá hesi eru tyðiliga ásett, herundir eisini dagfesting.

KAPITTUL 5
Arbeiðsplássið

§ 36. Arbeiðsplássið skal vera soleiðis innrættað, at tað lýkur øll trygdar- og heilsutlig krøv.

Stk. 2. Galdandi reglur og fyrisett mát, ið hava trygdar- ella heilsuligan týdning, skulu fylgjast, hevur ikki landsstýrismaðurin ásett annað.

§ 37. Landsstýrismaðurin í arbeiðsmarknaðarmálum kann áseta reglur um innrætting av føstum, fyribils, skiftandi og uttandura arbeiðsplássum, herundir serligar fyriskipanir í samband við kolanáms- og bergholsarbeiði.

Stk. 2. Í nevndu reglum kunnu nýtast ávísingar til reglur og fyrisett mát, um hesi eru týðuligа ásett, herundir eisini dagfesting.

Stk. 3. Føroya Landsstýri kann eisini áseta reglur um:

1) at byggiætlanir o.tl. í samband við bygging ella umbygging av virkjum, skulu sendast Arbeiðseftirlitinum til ummælis, áðrenn nevndu arbeiðir verða sett í verk.
2) at ætlanir um innrætting ella broyting av høltum, tekniskum útbúnaði o.a. skulu leggjast fyri Arbeiðseftirlitið til ummælis, ella góðkenning, áðrenn nevndu arbeiðir verða sett í verk, og
3) at bygningar, hølir o.tl. ikki mugu leigast út til vinnulig endamál fyrr enn spurningurin um hølini v.m. kunnu nýtast, til tað ætlaði endamálið, hevur verið lagt fyri Arbeiðseftirlitið til ummælis ella góðkenningar.

KAPITTUL 6
Teknisk hjálpartól

§ 38. Teknisk hjálpartól skulu verða framleidd, og kunna nýtast soleiðis, at tey eru full forsvarlig viðvíkjandi trygd og heilsu. Reglurnar viðvíkjandi nýtsluni galda eisini fyri umsiting, reingerð, umvæling o.a.

Stk. 2. Góðkendar reglur og fyrisett mát, ið hava trygdar- og heilsuligan týdning, skulu fylgjast, hevur ikki landsstýrismaðurin ásett annað.

§ 39. Landsstýrismaðurin í arbeiðsmarknaðarmálum kann áseta reglur um teknisk hjálpartól, herundir um:

1) at framleiðsla, innflutningur, avhending, framsýning ella nýtsla av serliga vandamiklum tekniskum hjálpartólum skal verða hannað,
2) at ætlanir um hygging, útinnan og uppseting av tekniskum hjálpartólum skulu leggjast fyri Arbeiðseftirlitið til ummælis ella góðkenningar,
3) at eitt teknisk hjálpartól skal vera góðkent av Arbeiðseftirlitinum, áðrenn tað verður avhandað ella latið til brúkaran ella tikið í nýtslu,
4) at teknisk hjálpartól skulu fráboðast til Arbeiðseftirlitið ella verða roynt ella aðrar eftirlitskanningar verða framdar, herundir eisini tíðarávísar kanningar,
5) at teknisk hjálpartól skal vera tyðiliga merkt, soleiðis at tað er lætt at finna fram til framleiðarin ella innflytarin, fyri at vissa kann fáast fyri tey teknisku data, tólið hevur, slag, uppruna, góðkenning, roynslir ella onnur viðurskiftir, sum hava týðning fyri arbeiðs- umhvørvið.

Stk. 2. Í reglunum kunnu nýtast ávísingar til normar og fyrisett mát, um hesi eru tyðiliga ásett, herundir eisini dagfesting.

KAPITTUL 7
Evni og tilfar

§ 40. Evni og tilfar, ið eru av slíkum slag, at tey kunnu vera vandamikil fyri, og minka um trygdina ella skaða heilsuviðurskiftini, mugu bert verða framleidd og verða nýtt í arbeiðsgerðum og arbeiðshættum, sum á tryggan hátt verja arbeiðsfólkini móti vanlukkum og sjúkum.

Stk. 2. Viðurkendar reglur og fyrisett mát, ið hava tryggleika- ella heilsuligan týdning, skulu fylgjast, hevur ikki Landsstýrismaðurin í arbeiðsmarknaðarmálum ásett annað.

§ 41. Landsstýrismaðurin í arbeiðsmarknaðarmálum

kann áseta reglur um framleiðslu, innflyting, goymslu, flutning og nýtslu av evnum og tilfari, herundir um:

1) serliga merking av evnum og tilfari, ið nýtt verða í arbeiði, ella innpakking teirra,
2) skyldu til at seta í verk heilsufrøðiligar mátingar av luftdálking,
3) fráboðan um evnir og tilfar við skyldu til ávísing um viðurskiftir, sum hava týdning fyri metan um, hvussu vandamikið evnið ella tilfarið er,
4) at evni ella tilfar, ið kann verða vandamikið ella á annan hátt kann minka um trygdina og heilsu støðuna, ikki má nýtast, um hetta kann skiftast um við eitt vandaleyst, minni vandamikið ella minni ørkymlandi evni ella tilfar,
5) at evni ella tilfar, ið kann vera vandamikið ella á annan hátt kann minka um trygdina og heilsustøðuna, ikki má nýtast til ávíst endamál ella innan serligt øki, áðrenn Arbeiðseftirlitsins góðkenning fyriliggur,
6) at teknisk databløð og líkn. frá framleiðara og innflytara av evni og tilfari skulu innihalda allar upplýsingar um evni ella tilfari og somuleiðis tá ávirkan hetta kann hava á trygdina og heilsustøðuna í arbeiðsumhvørvinum,
7) um brúkaravegleiðing frá útvegamonnum og arbeiðsgevarum.

Stk. 2. Landsstýrismaðurin í arbeiðsarknaðarmálum kann áseta reglur um bann móti framleiðslu, innflyting og nýtslu av evnum og tilfari, ið kunna verða vandamikil fyri, ella minka um trygdina og heilsustøðuna.

Stk. 3. Í reglunum um evni og tilfar kunnu nýtast normar og fyrisett mál, tá hesi eru tyðiliga ásett, herundir eisini dagfesting.

Stk. 4. Arbeiðseftirlitið ásetir markvirði fyri evnir og tilfar, og eisini eitt yvirlit yvir evnir og tilfar, ið vera hildin at vera vandamikil ella minka um trygdina og heilsustøðuna.

KAPITTUL 8
Hvíldartíð og frísamdøgur

§ 42. Arbeiðstíðin skal skipast soleiðis, at tað í hvørjum samdøgri, roknað frá tí, at arbeiðið byrjar, skulu arbeiðsfólk hava eina hvíldartíð, ið er minst 11 samfeldar tímar.

Stk. 2. Hvíldartíðin kann minkast til í minsta lagi 8 tímar í:

1) arbeiði í fiskavirkjum í háveiðutíðini,
2) árstíðarbundið arbeiði í byggi- og verkayrki,
3) vaktarskifti á virkjum, sum hava vaktarskipan, tá partarnir á arbeiðsmarknaðinum semjast um tað,
4) inn- og uppskiping og torvandi arbeiði, sum hoyrir til sum goymslu og pakkhúsarbeiði, og
5) arbeiði í landbúnaði.

§ 43. Arbeiðsfólk mugu ikki regluliga arbeiða sunnu- og halgidagssamdøgur, uttan so halgidagsarbeiðið er til samfelags fromа ella er neyðugt at varveita virðir. Halgidagssamdøgur skal liggja innanfyri skifti frá kl. 22.00 kvøldið fyri til kl. 08.00 morgunin eftir halguna.

Stk. 2. Sum endurgjald fyri mista frítíð orsaka av reglufigum sunnudagsarbeiði, hava arbeiðsfólk rætt til aðra samfelda frítíð innan fyri eina viku, við at samsvarandi tal av arbeiðstímum dettur burtur.

§ 44. Tá náttúruviðurskifti, vanlukkur, maskinbrek ella tílíkt koma óvart á, og hava við sær, at ólag kemur í rakstrin á virkinum, kunnu frávik gerast frá §§ 42 og 43, í tann mun, tað er avgerandi neyðugt, til regluligur rakstur aftur er fingin í lag. Frávikið skal skrivast í eftirlitsbókina ella annað líknandi skjal, sambært § 60.

§ 45. Frávik frá §§ 42-44 kunnu verða loyvd av Arbeiðseftirlitinum, tá:

1) útinnan av arbeiðinum ella arbeiðið er av slíkum slag, at tað kann ikki ásetast, ella
2) at serligir arbeiðshættir gera frávik rímuligt.

Stk. 2. Frávik frá einari einstakari hvíldartíð ella einum einstokum frísamdøgri kann í hvønn fori verða gjørt uttan at ein frammanundan hevur fingið loyvi til tess, um tað hevur ikki borið til at útvega nevnda loyvið í nøkrari tíð. Frávikið skal skjótast møguligt skrivliga fráboðast Arbeiðseftirlitinum við avriti til trygdarumboðsfólkini.

Stk. 3. Frávik kunnu við avtalu millum avvarandi arbeiðsgevarafelag og arbeiðstakarafelag verða gjørd í lógarinnar ásetingum um hvíldartíð og frísamdøgur. Nevndu avtalur hava bert gildi, um tær eru góðkendar av Arbeiðseftirlitinum.

Stk. 4. Fyri líkoknir ella serligar arbeiðsgreinir, har serligar umstøður gera tað neyðugt, hevur Landsstýrismaðurin í arbeiðsmarknaðarmálum heimild at gera frávik frá ásetingunum lógarinnar um hvíldartíð og frísamdøgur.

§ 46. Ásetingar í §§ 42 og 43 í løgini kunnu, um tað verður hildið neyðugt, frávíkjast fyri:

1) persónar í lægri starvum, sum bert ella fyri ein stóran part tilfinna leiðandi arbeiði, og ikki hava

skyldu til, hvat arbeiðstíðini viðvíkur, at fylgja teimum reglum, ið galda fyri tey arbeiðstólk, leir skulu leiða, og ikki arbeiða eftir nakrari fastari skipan.

2) persónar í leiðandi støvum, ið vegna serkunnleika ella líknandi viðurskiftini hava eitt serligt sjálvstøðugt starv, og
3) umboðssølufólk, ið hava arbeiði sítt uttanfyri tað fasta arbeiðsplássið á virkinum.

§ 47. Fyri arbeiði, sum í serligan mun kunna verða vandamikil fyri trygd og heilsu, hevur landsstýrismaðurin í arbeiðsmarknaðarmálum heimild til at áseta reglur um avmarkaða arbeiðstíð.

KAPITTUL 9
Børn og ung undir 18 ár

§ 48. Børn, ið ikki eru fylt 14 ár, mugu ikki hava vinnuligt arbeiði. Undantikið er tó lættari hjálparar-beiði 2 tímar um dagin. Viðvíkjandi børnum, sum hoyra til húski arbeiðsgevarans, so eru hesar reglur hert galdandi, tá tað snýr seg um arbeiði við teknisk-um útbúnaði, maskinum, hjálpar-tólum og evnum og tilfari, ið kunnu verða vandamikil fyri tey.

Stk. 2. Landsstýrismaðurin í arbeiðsarknaðarmálum kann áseta reglur um hægri aldursmark enn 14 ár fyri arbeiði, sum er av slíkum slag, ella at umstøðurnar eru solciðis, at arbeiði kann verða vandamikið fyri trygdina, heilsuna og menningina av teimum ungu.

Stk. 3. Annars kann landsstýrismaðurin í arbeiðs-marknaðarmálum áseta reglur um, at børn yngri enn 14 ár kunnu hava lættari vinnuligt arbeiði.

§ 49. Arbeiðstíðin fyri ungfólk, sum eru yngri enn 18 ár, má í vanligum førum ikki fara út um ta vanligu arbeiðstíðina fyri vaksin, sum arbeiða innan somu yrkisgrein.

Stk. 2. Ung mugu ikki arbeiða meira enn 10 tímar fall um dagin. Arbeiðstíðin skal vera í einum, avbrotin av hóskandi mat- og hvíldartíðum.

Stk. 3. Landsstýrismaðurin í arbeiðsarknaðarmálum kann áseta serligar reglur um í hvønn mun ung, sum eru yngri enn 18 ár, kunnu arbeiða meira enn ta vanligu arbeiðstíðina innan viðkomandi yrkisgrein.

§ 50. Ungfólk, ið ikki eru fylt 18 ár, skulu hava eina samlaða hvíldartíð, sum er í minsta lagi 12 tímar um samdøgrið.

Stk. 2. Nevnda hvíldartíð skal vanliga umfata tíðar-skeiði millum kl. 22.00 á kvøldi og kl. 05.00 á morgni.

Stk. 3. Fyri serlig yrki og arbeiðsøki, har umstøðurnar gera hetta neyðugt ella ynskiligt, kann landsstýr-ismaðurin í arbeiðsmarknaðarmálum áseta serligar reglur um longd av hvíldartíð og nær í døgninum henda skal verða.

KAPITTUL 10
Læknakanningar v.m.

§ 51. Fyri virkir, fak, faklig øki ella aðrar bólkar av starvsfólki, hvørs arbeiði kann hava við sær heilsu-vanda, kann landsstýrismaðurin áseta reglur um:

1) at starvsfólki skal kannast av lækna, áðrenn tey taka við starvi og meðan tey eru í starvi, og eisini aftaná at tey eru givin í starvinum, møguliga við regluligum læknakanningum.
2) at tað regluliga, ella í einstøkum føri, skulu ger-ast arbeiðsmedisinskar og arbeiðsheilsu- frøði-ligar kanningar ella aðrar kanningar av heilsu-viðurskiftunum.
3) líknandi kanningar, við atliti til um arbeiðið kann hava við sær vanda fyri trygd og heilsu.

KAPITTUL 11
Arbeiðsumhvørvisráðið

§ 52. Landsstýrismanninum í arbeiðsmarknaðar-málum verður heimilað at seta eitt arbeiðsum-hvørvisráð við einum umboði fyri arbeiðarafeløgini, einum umboði fyri arbeiðsgevarafeløgini, einum umboði fyri handverkarafeløgini, einum umboði fyri handverksmeistarafeløgini, einum umboði fyri arbeiðstakarar innan skrivstovu- og krambúðaryrki, einum umboði fyri arbeiðsgevarar innan skrivstovu- og krambúðaryrki og stjóranum fyri Arbeiðseftirlit-ið, ið er formaður ráðsins.

Stk. 2. Landsstýrismaðurin í arbeiðsarknaðarmálum tilnevnir umboðini og sama tal av tiltaksumboðum fyri eitt 4 ára starvsskeið.

Stk. 3. Landsstýrismanninum í arbeiðsmarknaðar-málum verður heimilað at seta nærri reglur fyri virki ráðsins.

Stk. 4. Arbeiðsumhvørvisráðið skal hava allar kunn-gerðir, sum við heimild í hesari lóg verða settar í gildi, til ummælis.

KAPITTUL 12
Arbeiðseftirlitið

§ 53. Stjórin á Arbeiðseftirlitinum hevur ta dagligu leiðslurna av stovninum.

§ 54. Uppgávurnar hjá Arbeiðseftirlitinum eru, í spurningtnu um arbeiðsumhvørvi, at:

1) vegleiða virkjunum, pørtunum á arbeiðsmarknaðinum og almenningin í spurningum, ið hava arbeiðsumhvørvisigan týdning,
2) hjálpa landsstýrismanninum í arbeiðsmarknaðarmálum við fyrireikingunum av reglunum, sambært lógini,
3) áseta nærri fyriskipanir við heimild frá landsstýrismanninum í arbeiðsmarknaðarálum,
4) kunna seg um teknisku og sosialu menningina, í samfelagnum, við atliti til, at betra um arbeiði, viðvíkjandi trygd og heilsu í arbeiðsumhvørvinum.
5) viðgera ætlanir til framleiðsluhættir, arbeiðspláss, teknisk hjálpartól v.m. og evnir og tilfar, og geva loyvir, sum eru í samsvar við lógina ella fyrisitingarligar reglur.
6) Ansa eftir, at lógin og tær fyrisetingar, sum verða gjørdar við heimild í lógini, verða hildnar.

§ 55. Landsstýrismaðurin í arbeiðsmarknaðarmálum kann geva stjóranum fyri Arbeiðseftirlitinum heimildir, sum sambært lógina hoyra undir landsstýrismanninum í arbeiðsmarknaðarmálum.

§ 56. Landsstýrismaðurin í arbeiðsmarknaðarmálum kann gera av, at eitt nærri avmarkað urbeiðsøki hjá Arbeiðseftirlitinum verður lagt til aðrar almennar myndugleikar, ella privatan stovn. Landsstýrismaðurin í arbeiðsmarknaðarmálum kann eisini gera av, í hvønn mun Arbeiðseftirlitið skal hava eftirlit við hesum.
Stk. 2. Landsstýrismaðurin í arbeiðsmarknaðarmálum kann áseta reglur um góðkenning av royndunum ella øðrum prøvtilfari, sum vísir, at reglurnar verða fylgdar, viðvíkjandi trygd og heilsu.
Stk. 3. Landsstýrismaðrin í arbeiðsmarknaðarmálum kann áseta reglur um gjald ella fast avgjald fyri tær kanningar og tænastur v.m., sum Arbeiðseftirlitið ger ella skipar fyri.

§ 57. Landsstýrismaðurin í arbeiðsmarknaðarmálum kann áseta reglur um fráboðanarskyldu av arbeiðsvanlukkum, eitringum, vinnuligum sjúkum, og øðrum viðurskiftum, av arbeiðsumhvørvisligum týdningi.
Stk. 2. Tann, sum í arbeiði sínum fyri ta almenna, ella tann, ið fyri tað almenna umboðar onkran stovn, og fær kunnleika um viðurskifti, sum bróta fyrisetingarnar í hesari lóg ella teimum reglum, sum við heimild í hesi lóg eru lýstar galdandi, skal uttan dvøl boða Arbeiðseftirlitinum frá hesum.

Stk. 3. Verður ein lækni varugur við, ella fær fræntir av, at onkur í arbeiði sínum hevur verið fyri skaðiligum árinum, skal hann beinanvegin siga Arbeiðseftirlitinum frá hesum. Landsstýrismaðurin í arbeiðsmarknaðarmálum kann áseta nærri reglur um hetta.

§ 58. Øll, sum sambært lógina hava álagdar skyldur, skulu eftir áheitan geva Arbeiðseftirlitinum allar upplýsingar ið neyðugir eru fyri virkið hjá eftirlitinum.
Stk. 2. Eftirlitsfólk hjá Arbeiðseftirlitinum hava til eina hvørja tíð myndugleika til uttan rættarúrskurð at kanna almenn og privat virkir, tó treytað av, at tey kunna prógva, hvørji tey eru. Um neyðugt hjálpir løgreglan í hesum sambandi.
Stk. 3. Eftirlitsfólkið hjá Arbeiðseftirlitinum kunna eisini uttan rættarúrskurð krevja atkomiligt skjøl útflýggjaði, taka fotomyndir og taka ávísar royndir til nærri kanningar. Arbeiðsgevarin ella umboðsmaður hansara skulu hava fráboðan um hetta.

§ 59. Arbeiðseftirlitið kann krevja, at viðurskifti, ið ikki eru í samsvar við lógarinar reglum ella avgerðum, sum tiknar eru við heimild í lógini, beinanvegin ella áðrenn eina av Arbeiðseftirlitinum ásetta freist verða fingin í rættlag.
Stk. 2. Um Arbeiðseftirlitið heldur tað vera neyðugt at byrgja fyri munandi og bóttandi vanda fyri trygdina og heilsuna hjá arbeiðsfólki ella øðrum, kann Arbeiðseftirlitið krevja, at nevndi vandi beinanvegin verður beindur burtur, hemmdir:
1) at arbeiðsfólkini beinanvegin ryma úr vandaøkinum,
2) at øll hýsla av einum tekniskum hjálpartóli, evnum ella tilfari beinanvegin verður steðgað, og
3) at alt arbeiði á nevnda øki verður steðgað.

Stk. 3. Stjórin fyri Arbeiðseftirlitið kann krevja, at tann ið útflyggjar ella marknaðarførir teknisk hjálpartól, persónliga verndarútgerð ella evni og tilfar, sum hóast hetta verður nýtt sum fyriskrivað, kortini vísir seg at vera til ampa fyri trygd og heilsu, skal syrgja fyri, at neyðug tiltøk verða fraund, so sleppast kann undan hesum.
Tað kann soleiðis krevjast:
1) at útflyggingin ella marknaðarføringin verður steðgað,
2) at viðkomandi tekniska hjálpartól, persónliga verndarútgerð ella evni og tilfar verður aftarkallað frá marknaðinum.

§ 60. Arbeiðsgevarin skal, tá ið Arbeiðseftirlitið

krevur tað, sígggja til, at ein eftirlitsbók er til taks á hvørjum arbeiðsplássi. Eftirlitið skal her fara við merkingar um útint eftirlit, og skulu eftirlitsfrágreiðingar og annars øll skrivlig boð frá Arbeiðseftirlitinum goymast her.
Arbeiðseftirlitið ásetur annars, hvussu eftirlitsbókin skal nýtast og goymast.

§ 61. Myndugleikar og persónar, sum eru sett til at útinna uppgávur eftir kap. 10-12, eins og hvør tann sum hjálpir til við hesum arbeiði, hava tagnarskyldu.
Stk. 2. Eftirlitsfólk hjá Arbeiðseftirlitinum, mugu ikki geva arbeiðsgevara ella umboðsmanni hansara upplýsingar um, at ein eftirlitsvitjan er gjørd orsaka av eini kæru.

§ 62. Landsstýrismaðurin í arbeiðsmarknaðarmálum kann áseta nærri reglur um samstarvið millum Arbeiðseftirlitið og aðrar almennar myndugleikar.

§ 63. Landsstýrismaðurin í arbeiðsmarknaðarmálum kann áseta, at fyriskipanir, ið kunna verða gjørdar sambært hesa lóg, og sum eru lýstar við heimild í donsku arbeiðsumhvørvislógini, heilt ella lutvíst skulu galda her á landi. Hetta kann ásetast uttan at fyriskipanirnar verða kunngjørdar í sínni heild, men soleiðis at bert tilskilað verður nr. og heiti á donsku kunngerðini, og soleiðis at eintøk av donsku kunngerðunum eru at fáa á Arbeiðseftirlitinum.

KAPITTUL 13
Kærur

§ 64. Tær avgerðir, sum Arbeiðseftirlitið tekur, kunna kærast til landsstýrismannin í arbeiðsmarknaðarmálum innan 4 vikur eftir, at viðkomandi hevur fingið boð um avgerðina.
Stk. 2. Kættstundis kæra er tálmandi, tá avgerð frá kærumyndugleikanum er tikin, ella til kærumyndugleikin tekur aðra avgerð. Kæra um avgerðir tiknar eftir § 59. Stk. 2. er ikki tálmandi.
Stk. 3. Landsstýrismaðurin í arbeiðsmarknaðarmálum kann áseta, at avgerðir ikki kunna kærast til landsstýrismannin í arbeiðsmarknaðarmálum, men at avgerðirnar kunnu kærast til eitt kærustoyn.

KAPITTUL 14
Revsing

§ 65. Um ikki hægri revsing er heimilað sambært aðrari lóggávu, verður við bót, hefti ella fongsul uppi eitt ár, hann revsaður ið:
1) fremur brot á §§ 11-18, stk. 1, §§ 21-30, § 33, stk. 1, § 34, stk. 1, § 36, stk. 1, § 38, stk. 1, § 40, stk. 1, § 57, stk. 2 og 3, § 58, 1. stk. og § 60.
2) letur arbeiði útinna, ið stríðir ímóti ásetingunum í kapitlunum 8 og 9, leiðir ella hevur eftirlit við slíkum arbeiði ella útinnir arbeiði, ið stríðir ímóti kapitul 8,
3) ikki ger eftir boðum givin eftir § 59 ella
4) letur vera við at geva upplýsingar eftir § 18, stk. 2.

Stk. 2, § 23 í revsilógini um medvirkan er eisini galdandi fyri revsiábyrgdina, sum nevnd er í stk. 1.

§ 66. Fyri brot á §§ 11-13, § 34, stk. 1, § 38, stk. 1, og § 40, stk. 1, umframt viðurskiftir sum eru fevnd av § 65, stk. 1, nr. 2 og 3, kann arbeiðsgevarin verða sektaður við bót, sjálvt um brotið ikki kann roknast gjørt við vilja ella ósketni.

§ 67. Í ásetingunum, sum eru lýstar galdandi sambært hesa lóg, kunna ásetast reglur um bøtur fyri brot á ásetingarnar og boð ella hann, sum eru sett eftir ásetingunum. Eisini kann ásetast, at ein arbeiðsgevari kann sektast við bót fyri brot á ásetingar, boð ella hann sum nevnt, sjálvt um brotið ikki kann roknast gjørt við vilja ella av ósketni.

§ 68. Bót, sektin sambært § 66 og § 67, 2. punktum kann ikki áleggjast virkisleiðarum og øðrum smb. § 19.

§ 69. Fyri brot, sum verða framd av partafeløgum ella lutafeløgum ella líknandi, kunna sjálv felagini verða sektað.
Stk. 2. Er brotið framt av heimastýrinum, einari kommunu ella kommunufelagnum, kann heimastýrið, kommunan ella kommunufelagið verða sektað.

§ 70. Tá ung undir 18 ár verða sett í arbeiði, sum er í stríð við reglurnar í hesi lóg ella teimum ásetingum, sum eru lýstar galdandi sambært hesa lóg, kann tann, sum hevur foreldramyndugleikan, verða sektað, um so er, at viðkomandi er vitandi um, at arbeiðið er farið fram.

KAPITTUL 15
Gildi og fyribilsreglur

§ 71. Henda lóg kemur í gildi 1. januar 1999, og samstundis fer úr gildi:
Løgtingslóg nr. 58 frá 24. mai 1974 um arbeiðaravernd, sum broytt við løgtingslóg nr. 81 frá 26. mai 1982, løgtingslóg nr. 44 frá 5. mai 1987 og løgtings

lóg nr. 126 frá 21. mai 1993.

Stk. 2. Fylgjandi reglur, sum eru lýstar galdandi við heimild í teimum í 1. stk. nevndu lógum, verða framvegis galdandi við teimum í hesi lóg fylgjandi broytingum, til tær verða settar úr gildi ella til tær verða avloystar av reglum lýstar galdandi við heimild í hesi lóg:

1) Kunngerð nr. 123 frá 23.10.1996 um trystíløt og rørskipan undir trysti.
2) Kunngerð nr. 126 frá 11.11.1996 um elevatorar, dampketlar og nýtslu av asbesti v.m.
3) Kunngerð nr. 126 frá 04.09.1995 um trygdararbeiði á virkjum og arbeiðsplássum.
4) Kunngerð nr. 127 frá 04.09.1995 um trygdarskeið.
5) Kunngerð nr. 128 frá 04.09.1995 um lyftiútgerð og spøl (kranar).
6) Kunngerð nr. 129 frá 04.09.1995 um innretning av tekniskum hjálpartólum.
7) Kunngerð nr. 131 frá 04.09.1995 um persónliga verndarútgerð.
8) Kunngerð nr. 132 frá 04.09.1995 um trygdarkrøv v.m. til persónliga verndarútgerð.
9) Kunngerð nr. 133 frá 04.09.1995 um flytbar trystíløt við innihaldi.
10) Kunngerð nr. 134 frá 04.09.1995 um markvirði fyri óljóð á arbeiðsplássum.
11) Kunngerð nr. 135 frá 04.09.1995 um reglur fyri arbeiði á skipum við tangum til olju o.a.
12) Kunngerð nr. 136 frá 04.09.1995 um reglur fyri byggipláss og líknandi arbeiðspláss.
13) Kunngerð nr. 102 frá 19.07.1990 um aldursmark at passa ávísar maskinur á flakavirkjum v.m.
14) Kunngerð nr. 139 frá 02.10.1992 um skyldur hjá læknum og tannlæknum at siga Arbeiðseftirlitinum frá vinnusjúkum.
15) Kunngerð nr. 14 frá 24.01.1990 um fráboðan av arbeiðsvanfukkum.
16) Kunngerð nr. 59 frá 18.07.1985 um loyvisbrav til at kuyra gaffiltrukk.
17) Kunngerð nr. 106 frá 19.10.1982 um innandura trukkkoyring, sum broyt við kunngerð nr. 46 frá 17.05.1984.
18) Kunngerð nr. 89 frá 12.11.1979 um krunføraraprógv.
19) Kunngerð nr. 138 frá 03.12.1990 um kavaraútgerð, um tryggleika og um læknakanning hjá kavarum.
20) Kunngerð nr. 26 frá 01.03.1994 um kavaraskeið og kavararoyndir.
21) Kunngerð nr. 57 frá 09.05.1994 um góðkendar kavaraskúlar.
22) Kunngerð nr. 15 frá 24.01.1990 um frysti- og kuldaútbúnaðarinnretningi.
23) Kunngerð nr. 82 frá 30.08.1984 um trygdartiltøk við nýtslu av geislavirknum evnum.
24) Kunngerð nr. 11 frá 30.01.1980 um goymsfur til spreingievni við seinni broytingum.
25) Kunngerð nr. 11 frá 13.02.1997 um evni og tilfar.
26) Kunngerð nr. 131 frá 07.10.1990 um epoxyharpiks og isocyanater v.m.
27) Kunngerð nr. 80 frá 21.04.1993 um handlit við ethanoli.
28) Kunngerð nr. 72 frá 23.06.1987 um reglur fyri Arbeiðsumhvørvisráðið.

Viðmerkingar

Inngangur:

Føroya Landsstýri heitti í 1988 á Arbeiðsumhvørvisráðið um at koma við uppskoti til nýggja lóg um arbeiðsumbvørvi. Ráðið hevði fyrsta fund sín 15. februar 1988, har nevnda lógaruppskot var til viðgerðar. Síðan vóru hildnir 12 fundir, og hevur Arbeiðsumhvørvisráðið á fundi 12. desember 1990 gjørt endaliga tilmæli um nýggja arbeiðsumhvørvislóg, aftaná at uppskotið hevði verið til umrøðu hjá øllum vinnufeløgum, stovnum og kommunum.

Limirnir í Arbeiðsumbvørvisráðnum eru:

1. Jógvan Vágsheyg	Føroya Arbeiðsgevarafelag	(Arne Poulsen, varalimur)
2. Ingeborg Vinther	Føroya Arbeiðarafelag	(Karl Johansen, varalimur)
3. Óla Jákup Guttesen	Føroya Handverksmeistarafelag	(Regin Joensen, varalimur)
4. George Nielsen	Føroya Handverkarafelag	(Leivur Nygaard, varalimur)
5. Tummas Hanus Dam	Føroya Keypmannafelag	(Regin Andreasen, varalimur)
6. Birgerð Klein	Føroya Skrivstovu- & Kramb.felag	(Erhard Jacobsen, varalimur)
7. Eli Davidsen.	Arbeiðseftirlitið, formaður.	

Henda lóg skal avloysa lóg um arbeiðaravernd, sum kom í gildi 1. januar 1975. Í 1973 setti Danmark eina arbeiðaraverndarlóg í gildi fyri Grønland. Lógin bleiv umsett til føroyskt og bleiv viðtikin á Føroya Løgtingi 24. mai 1974.

Síðani hava øll grannalondini fingið arbeiðsumhvørvislóg, meðan Føroyar framvegis nýtir arbeiðarverndarlógina við nøkrum broytingum.

Í 1988 álegði landsstýrismaðurin Arbeiðsumhvørvisráðnum at gera eitt fullfíggjað uppskot til eina tíðarhóskandi arbeiðsumhvørvislóg fyri Føroyar. Hetta varð gjørt og uppskotið varð sent kommununm, stovnum og øllum vinnufeløgum (bæði hjá arbeiðsgevara- og arbeiðstakarum) til ummælis.

Sum grundarlag fyri hesum lógaruppskoti hevur ráðið havt lógina, sum galdandi er í Grønlandi um arbeiðsumhvørvi.

Orsøkin til, at hendan lóg er nýtt sum fyrimynd fyri føroyska lógaruppskotinum, er tann, at ráðið metir umstøðurnar og viðurskiftini annars í Føroyum og Grønlandi vera so lík, at stórir partar av grønlendsku lógini eisini passa til okkara viðurskifti.

Ráðið hevur tó eisini kannað rættarstøðuna í hinum grannalondum okkara, og hevur orðaskifti verið um ymiskar reglur, sum galdandi vóru í hesum londum, og um tær áttu at verið settar í gildi í Føroyum eisini.

Høvuðsendamálið hjá ráðnum hevur tó verið at fáa eina lóg, sum er tillagað eftir teimum serføroysku viðurskiftunum, og hevur ráðið gjørt endaliga uppskot sitt út frá hesum sjónarmiði.

Munurin millum hetta lógaruppskot og arbeiðaraverndarlógina er stórur. Arbeiðarverndarlógin hevur grundarlag í vernd móti vandamiklum maskinum. Í dag fevnir arbeiðsumhvørvi um velferð, fyribyrging, best møguliga skipan av arbeiðið út um vernd móti vandamiklum maskinum.

Lógin um arbeiðaravernd er tó broytt, soleiðis at dansk kuntigerð við heimild í donsku arbeiðsumhvørvislógini kann setast í gildi (§17, stk. 3, broytt við ll. nr. 81 frá 26.5.1982), soleiðis at Føroyar í ein vissan mun fylgir grannalondunum. Tó er tað einans kunngerðirnar um tekniskar broytingar, sum verða settar í gildi við heimild í §17, stk. 3.

Hóast innføring av §17, stk. 3, hevur tað ikki broytt so nógv, at tað gevur somu møguleikar, sum grannalondini hava í teirra umhvørvislógum. Ein nýggj lóggáva á økinum vil økja møguleikirnar fyri at regulera arbeiðsumhvørvið, soleiðis sum gjørt verður í grannalondunum.

Um oljuútnaður verður í framtíðini verður tað eisini neyðugt við einum nýtímans lóggávu innan fyri arbeiðsumhvørvisøkið eins og tað er ein fyrimunur, at lóggávurnar líkjast teimum í grannalondunum.

Endaliga hevur Norðurlendsk Arbeiðsumhvørviskonventiónin, sum kom í gildi 24. mars 1990, tað mál, at londini gera á leið eins reglur. Í artikkul 1 stendur soleiðis: "*Endamálið við hesum sáttmála er at styrkja og menna norðurlanda samstarvið við atliti til at frembja eina menning fram ímóti einum støðugum betri arbeiðsumhvørvi í øllum teimum norðurlendsku londum,...- at frembja samskipan av krøvum og reglum, sum hevur við arbeiðsumhvørvið at gera,..*". Í artikkul 4 stendur: "*Tey norðurlendsku londini skulu framhaldandi útbyggja samstarvið við at samskipa og tilpassa arbeiðsumhvørvisreglunar millum londini.Endamálið við samstarvinum skal verða støðugt at betra um arbeiðsumhvørvið og tillaga reglurnar á einum dygdarligum hátt um støði*".

Uppskotið frá ráðnum varð sent landsstýrinum í 1991. Á vári 1996 varð uppskotið lagt fyri tingið, men málið bleiv ikki liðugt viðgjørt og datt burtur. Tað er hetta uppskot við smáum broytingum, sum altur verður lagt fyri tingið.

Viðmerkingar til tær einstøku greinirnar

Viðv. § 1:

Hendan grein ásetir endamál lógarinnar og er hetta tað sama, sum galdandi er í Danmark og hinum granalondum okkara.

Viðv. § 2:

Greinin ásetir øki lógarinnar og er her eisini talan um sama øki, sum galdandi er í hinum norðurlondunum.

Viðv. § 3:

Hendan grein ásetir nærri fyriskipan um, í hvønn mun lógin er galdandi fyri loftferðslu, sjóvinnu og fiskivinnu.

Orsøkin til at lógin ikki í sínari heild er galdandi fyri hesi økir er tann, at umstøðurnar her eru so sermerkt ar, at ráðið eins og lógsmiðirnir í granalondum okkara ikki meta, at arbeiðsumhvørvislóg, sum galdandi er á landi, í fullan mun er nýtilig fyri loftferðslu, sjóvinnu og fiskivinnu.

Uppskot er ikki sett fram um at fiskivinnan, sum er høvuðsvinna okkara, verður tikin við í hesa lóg, men ráðið toyvir sær at vísa á, at ein støðugt størri partur av fiskiflota okkara hevur verksmiðjur, har arbeiðið ikki stórvegis víkir frá arbeiðsumstøðunum innan fiskivinnuna á landi, og eigur tí at verða miðað ímóti, at samstarv lerst ímillum t.d. Arbeiðseftirlitið og Skipasýnið um at samskipa arbeiðið soleiðis, at støðið, ið hugsa verður um arbeiðsumhvørvið t.d. viðvíkjandi trygd, í tann mun hetta ber til, verður tað sama fyri verksmiðjuarbeiði á sjógvi og á landi.

Viðv. § 4:

Sambært hesari grein, skal trygdararbeiði í størst møguligan mun fara fram á sjálvum virkinum og er ein grundin til hesa skipan tann, at ógjørligt er hjá Arbeiðseftirlitinum at hava dagligt eftirlit av tí sum fyriferst innanfyri vinnuvirkir.

Samtøkt hesari grein, verður tað eisini serliga vist á, at eisini tá talan er um minni virkir, t.e. virkir, har minni enn 10 fólk starvast, hava leiðsla og starvsfólk skyldu til at vísa ansni viðvíkjandi arbeiðsumhvørvistrupulleikum, sum kunnu stinga seg upp.

Viðv. § 5:

Talið á arbeiðsfólki er í hesum uppskoti sett til 10, og er tað sama tal, sum í t.d. Danmark og Grønlandi.

Viðvíkjandi stk. 2 í høvuðsatriðinum fyri nevndu grein er at viðmerkja, at ætlanin við hesari skipan er í størst møguligan mun at miðspjaða trygdararbeiði, sum gjørt verður.

Trygdarbólkarnir verða skipaðir innanfyri hvørt arbeiðsøki, og er hetta liður í sama miðspjaðing.

Arbeiðsleiðarin hevur vanliga beinleiðis leiðsluna og eftirlitið við arbeiðsøkinum og verður tað tí mett natúrligt, at hann er annar parturin í trygdarbólkinum.

Í sambandi við stk. 3 er at viðmerkja, at tað eru starvsfólkini, sum velja trygdarumboð og skal við hesum skiljast, at tað eru øll, sum eru í starvi arbeiðsgevarans, íroknað lærlingar, starvsmenn og onnur, sum tó ikki skulu hava beinleiðis leiðsluratt.

Viðvíkjandi stk. 4. er heimild til hjá Arbeiðseftirlitinum at veita undantak frá kravinum um serligar trygdarbólkar, men hevur ráðið lagt serligan dent á, at hetta bert eigur at verða gjørt, har vissa er fyri, at hetta ikki fører við sær verri trygdarstøðu enn hana, sum fyriskipað verður samsvarandi hesari lóg.

Viðv. § 6:
Tá ið tosað verður um umboð fyri arbeiðsgevaran ið hevur ábyrgdina av virkinum, skal hetta skiljast sum persónur, sum kann taka avgerðir arbeiðsgevarans vegna viðvíkjandi teimum trygdar- og heilsuviðurskiftum, sum skulu viðgerast í trygdarnevndini.

Uppgávan hjá trygdarnevndini er m.a. at vera ráðgevi arbeiðsgevarans í sambandi við trygdar- og heilsuspurningum.

Nevndin hevur harafturímóti ikki heimild til at taka avgerðir í samband við fremjan av trygdar- og heilsutiltøkum á virkinum.

Tá arbeiðsgevarin ella hansara umboð eru limir í nevndini, vil tað vanliga tó vera soleiðis, at arbeiðsgevarin er samdur í og fylgir teimum ráðum, sum nevndin gevur.

Viðv. § 7:
Mett verður, at trygdarnevndin á teimum einstøku virkjunum, eigur at tilnevna ein dagligan leiðara av trygdararbeiðnum, soleiðis at hesin kann fyriskipa dagliga arbeiði hjá nevndini.

Ein fyritreyt er sjálvsagt, at arbeiðsgevarin letur viðkomandi ta tíð, sum neyðug er, fyri at gera slíkt arbeiði.

Viðvíkjandi øðrum petti kann viðmerkjast, at ráðið er av tí áskoðan, at landsstýrismaðurin bert í serstøkum førum eigur at gera frávik frá reglunum í hesari lóg.

Eisini hevur landsstýrismaðurin sambært nevndu grein rætt til at laga reglurnar eftir teimum serligu viðurskiftunum á ávísum arbeiðsplássum, og kann ráðið her vísa sum dømi, at talan kann vera um arbeiðspláss innan byggivirksemi, handlar, hotell og matstovuvinnu, reingerðingsvinnu, flutningsvinnu umframt skrivstovu og fyrisiting.

Ráðið viðmerkir í hesum sambandi, at tað sjálvsagt í øllum førum má vera soleiðis, at trygdin ikki verður sett til viks, og at frávik bert verða gjørd, har haldgóðar metingar vísa, at trygdarviðurskiftini eru nóg væl vard, eisini við teimum broytingum, sum landsstýrismaðurin í teimum einstøku førunum fremur.

Viðv. § 8:
Tað kemur sjálvsagt at vera ymist frá virki til virki, og m.a. grundað á stødd og arbeiðsumstøðurnar, hvussu long tíð náttúrliga verður nýtt til trygdar- og heilsuarbeiði.

Fyrst og fremst er tað arbeiðsgevarin, sum avger, hvussu nógv tíð skal setast av til slíkt arbeiði.

Verður ósemja um ta tíð sum nýtast skal til slíkt arbeiði, kann málið leggjast fyri Arbeiðseftirlitið.

Avgerðin frá Arbeiðseftirlitinum kann sambært grein 64 kærast til landsstýrismannin í arbeiðsmarknaðarmálum.

Viðvíkjandi 2. petti kann viðmerkjast, at tað eisini í hesum føri í fyrstu atlatgu er arbeiðsgevarin, sum metir um trygdarbólkarnir og trygdarnevndirnar skulu luttaka í teimum ymisku ráðleggingunum

Viðvíkjandi 4. petti vísir ráðið á, at arbeiði hjá trygdarbólkunum og trygdarnevndunum eru av alstórum týdningi fyri alt trygdararbeiði, og eigur hetta arbeiði tí at vera væl lagt til rættis, fyri at fáa sum mest burturút.

Tað er ráðsins meting, at náttúrligt er at taka trygdarbólkin og trygdarnevndina við í sambandi við, at virklið leggur til rættis arbeiðsgongd og innretting av arbeiðsplássi.

Tað eigur tí at vera ein fyritreyt, at bæði trygdarhólkurin og trygdarnevndin láta havi til at luttaka í teimum ætlanum, sum gjørdar verða, áðrenn virkið tekur endaliga stoðu í slíkum málum.

Viðv. § 9:
Arbeiðsgevarin hevur eftir 1. petti skyldu til at rinda allar tær útreiðslur og tann inntøkumiss, sum trygdarumboði verður fyri, í sambandi við trygdararbeiði.

Her eru eisini íroknaðar útreiðslur og inntøkumissur í sambandi við luttøku av teimum í § 8 nevndu ráðleggingum.

Viðmerkjast kann í hesum sambandi, at ein ástøðumannanevgerð í faktigum gerðarrætti 4. juli 1975 í Danmark, nærri vísir, hvat prøvtilfar skal til fyri inistart inntøku.

Málið snúði seg um, at virkið bert vildi gjalda trygdarumboðnum ta vanligu tímalønina, bóast trygdarumboðið hevði starvast við akkordskipan, og soleiðis hevði havt eina hægri løn.

Ástøðumaðurin kom til ta niðurstøðu, at viðkomandi starvsfólk skuldi hava endurgjald fyri tann vanligu lønarmissin, t.v.s. samsvarandi tí akkordløn, sum viðkomandi hevði fingið, um hann hevði starvast tann dag, skeiðvirksemið fór fram.

Viðvíkjandi 2. petti er at viðmerkja, at ráðið heldur tað vera rætt, at landsstýrismaðurin fær møguleika fyri, har tørvur er á hesum, at áseta reglur um, at landskassin letur tilskot til tær framanfyri nevndu útreiðslur.

Viðvíkjandi 3. petti er at viðmerkja, at ráðið metir at tað er natúrligt, at limirnir í trygdarskipanini á sama hátt sum álitisfólkið, eru vardir móti uppsøgn.

Hetta skal forða fyri, at tey fólk, sum luttaka í trygdarskipanini, skulu kunna koma undir trýst frá arbeiðsgevaranum, í sambond við útinning teirra av trygdararbeiðinum.

Sjálvt um neyðugt verður hjá virkjunum at minka um arbeiðsmegina, kann arbeiðsgevarin ikki uttan víðari siga trygdarumboðið úr starvi.

Viðvíkjandi 4. stk. er at viðmerkja, at danska lógin leggur heimildina til at avgera hesar tvætur til Arbeiðsrættin.

Av tí, at vit ikki hava Arbeiðsrætt í Føroyum, metir ráðið, at vanligu dómstólarnir eiga at hava hesar heimildir, har fakliga gerðarrættarskipanin ikki kann nýtast. Sama skipan er galdandi í Grønlandi.

Viðv. § 10:
Ásetingarnar í hesari grein skulu siggjast í samanhangi við hinar reglurnar í kapittul 2, og er endamálið við øllum hesum ásetingum at royna at gera virkið fært fyri sjálvt at loysa teir trygdar- og heilsutrupulleikar, sum eru ella kunna at vísa seg á virkinum.

Sum kunnugt, so verður í iðnaðinum tikið í nýtslu ymisk nýggj evni og nýggjar arbeiðsgongdir og metir verður tí, at landsstýrismaðurin skal hava heimild til áseta nærri reglur um møguligu sakkøna hjálp. t.d. í slíkum førum.

Arbeiðsgevarin kann á ymiskan hátt líka sínar skyldur, samsvarandi teimum reglum, sum landsstýrismaðurin møguliga kemur at seta í verk, av tí at avgerandi í slíkum førum er, at tað í veruleikanum verður latin tann sakkøna hjálp sum neyðug er.

Arbeiðsgevarin hevur soleiðis í fyrstu atløgu rættin til at meta um, hvussu henda sakkøna hjálp kann fáast til vega.

Í hesum táttri verður eisini víst til teir kærumøguleikar, sum eru ásettir sambært seinni greinum í hesari lóg.

Kapittul 3

Hetta kapittul ásetir grundleggjandi skyldurnar hjá arbeiðsgevara, arbeiðsleiðarum, starvsfólki, útvegamonnum, innleggjarum, umvælarum, ráðleggjarum o.ø.

Í mun til galdandi lóggávu er talan um eina viðkan av tí persónsbólki, og eisini av teimum skyldum, sum álagdar verður hesum bólkum.

Viðv. § 11:

Í samband við hesa grein, hevur tað alstóran týdning at ásetta nærri, hvat liggur í fyribrigdinum arbeiðsgevari, av tí, at tað bert er hann, sum sambært § 66 og 67 í uppskotinum hevur objektiva ábyrgd og kann dømast bót, grundað á tey brot, sum nevnd eru í frammanfyri nevndu lógargrein.

Sambært rættarpraksis, so er undir núgaldandi skipan í Danmark, persónur, sum hevur havt ein sjálvstøðugan lut í útinnanini av arbeiðinum, dømdur samhært objektivu arbeiðsgevarareglunum, men skal tað nú bert vera sjálvur arbeiðsgevarin, sum eigur at kunna dømast sambært nevndu grein.

Undir núgaldandi skipan, hevur objektiva ábyrgdin t.d. verið løgd á stjórar í partafeløgum og býarverkfrøðingar hjá kommunum.

Broytingin í lógarreglunum í Danmark grunda seg á fyrireikingararbeiði, sum gjørt var í nevnd, hvørs niðurstøða var latin løgmálaráðnum 03.11.1975.

Í nevndu niðurstøðu verður sagt, at objektiva ábyrgdin bert eigur at vera áløgd virkiseigarum, soleiðis at skilja, at tað er tann persónur sum fær fíggjarligan vinning av rakstrinum av virkinum.

Útfrá hesum hevur danska arbeiðsmálaráðið allýst arbeiðsgevaran sambært arbeiðsumhvørvislógini, soleiðis at tað er tann persónur sum er eigari av virkinum, partvís hevur avgerandi heimildirnar, tá hugsað verður um at leggja til rættis arbeiðsgongdina á virkinum, og bygnaðin, og partvís beinleiðis hevur fyrimunin av rakstrarúrslitinum hjá virkinum. Har talan er um virkir, sum eru tilevnaði sum kollektivar eindir, t.d. partafeløg, lutafeløg ella líknandi, vil objektiva ábyrgdin sum høvuðsregla verða gjørd galdandi móti kollektivu eindini sum soleiðis.

Um vit leggja hesa allýsing til grund, má talan vera um eina broyting í mun til tað sum vit nú leggja í orðið arbeiðsgevari sambært lógini, sum viðvíkjur arbeiðaravernd.

Hetta førir við sær, at vit t.d. í partafelagi mugu meta nevndina/nevndarformannin sum arbeiðsgevara, meðan stjórin, um so er at hann ikki fúkar definitiónina, sum nevnd er frammanfyri, nú eftir øllum at dømma bert má metast sum arbeiðsleiðari, tá ið vit tosa um reglurnar í lóg um arbeiðsumhvørvi.

Tá talan er um kommunur er tað bygdaráðsformaðurin/borgarstjórin, sum við atliti til hesa lóg má metast sum arbeiðsgevari.

Spurningurin um virkisleiðarar kunnu metast sum arbeiðsgevarar má tó metast útfrá hvørjum virki sær, við einari føkiligari meting, og í grannalondum okkara hava teir víst á, at har leiðarin í veruleikanum hevur eina støðu, har hann hevur endaliga orðið, tá talan er um avgerðir sum takast skulu, so eigur møguleiki at vera fyri, eisini tá talan er um brot á lóg um arbeiðsumhvørvi, at meta viðkomandi sum arbeiðsgevara.

Tann endaliga ásetingin av, hvør ið samtbert tógina skal metast sum arbeiðsgevari, verður sjálvsagt ásett av rættinum.

Viðv. § 12:
Mett verður at møguleiki skal vera fyri hjá Arbeiðseftirlitinum at áseta nærri reglur um, hvat eigur at vera av útgerð til fyrstuhjálp á virkjum.

Eisini kann tørvur vera á serstakari skaðastovu ella øðrum útbúnaði á størri virkjum, somuleiðis sum Arbeiðseftirlitið her kann krevja, at minst eitt fólk hevur tikið góðkent skeið í fyrstuhjálp.

Viðv. § 13:
Skyldan til at hava eftirlit snýr seg um tað arbeiði sum starvsfólkið ger, og harafturat, at arbeiðsgongdin annars er forsvarlig.

Tá mett verður um arbeiðsgevarin hevur bildið leiðbeiningar og eftirlitsskyldur sínar, má havast í huga tann vanda, sum er tengdur at tí einstøku arbeiðsgongdini, soleiðis at har arbeiðsgongdin er meira vandamikil, og har vandin fyri vanlukku ella heilsuskaða er størri, har eigur eftirlitið sjálvsagt eisini at vera strangari.

Viðv. § 14:
Í hvønn mun arbeiðsgevarin eigur at kunna arbeiðsfólkið, er partvís tengt at fyritreytunum hjá tí einstaka starvsfólkinum, og partvís av hvat slag av arbeiði talan er um.

Størri krøv eigur at vera sett til kunningarskylduna hjá arbeiðsgevaranum, har talan er um arbeiði við serligum vanlukku- og heilsuskaðiligum vanda.

Sama er galdandi har talan er um yngri starvsfólk og nýtt fólk sum kemur í starv, og soleiðis ikki hevur tað innlit sum neyðugt er, fyri á tryggan hátt at røkja starv sítt.

Viðvíkjandi 2. petti kann viðmerkjast, at starvsfólkið eigur at fáa upplæring og leiðbeining í nýtslu av verndartiltøkum, eisini persónligum verndarlutum.

Eisini hevur arbeiðsgevarin skyldu til seinni at kanna, at tær áður givnu leiðbeiningar verða fylgdar av starvsfólkinum.

Viðvíkjandi 3. petti er at siga, at hugsað verður her um økir, har serligur tørvur er á leiðbeining.

Viðv. § 15:
Hendan lógargrein vísir hvønn dent lógaruppskotið leggur á samstarvið á hvørjum einstøkum virki.

Umframt sjálvur at luttaka, ella lata umboð sítt luttaka í samstarvinum, skal arbeiðsgevarin eisini tryggja, at samstarvið støðugt heldur áfram á ein hóskiligan hátt.

Brot á hesa grein verða revsað sambært § 65.

Viðv. § 16:
Endamálið við lógargreinini er at áseta samstarvsskyldu fyri fleiri arbeiðsgevarar á sama arbeiðsplássi til fremja fyri trygdina og heilsuna, hjá øllum sum starvast á arbeiðsplássinum.

Mett verður at trygdin verður betri á arbeiðsplássinum, har hvør arbeiðsgevari ikki bert skal taka sær av trygdini hjá sínum starvsfólkum, men at ein samstarvsskylda eisini er galdandi millum allar arbeiðsgevararnar og øll tey starvsfólk, sum har starvast.

Orðið arbeiðsstaður gevur rúmari ræsur enn orðið virki ella arbeiðspláss.

Viðvíkjandi 2. pætti kann viðmerkjast, at landsstýrismaðurin t.d. kann áseta nærri reglur um, at arbeiðsgevararnir kunnu sínámillum avtala, hvør av teimum skal hava ábyrgdina av arbeiðsviðurskiftunum á arbeiðsstaðnum.

Viðv. § 17:
Hóast nevndu grein, so hava øll sjálvsagt rætt til at venda sær til Arbeiðseftirlitið í sambond við viðurskiftir, sum snúgva seg um trygd og neilsu á arbeiðsplássum.

Um talan er um smá arbeiðspláss har hvørki trygdarumboð ella álitisfólk eru, skulu starvsfólkini hava kunnleika um tær avgerðir, sum Arbeiðseftirlitið hevur tikið.

Er talan um stór arbeiðspláss við fleiri deildum, so hevur trygdarumboðið bert krav uppá at fáa kunnleika um avgerðir frá Arbeiðseftirlitinum, sum snúgva seg um viðkomandi deild.

Sama er galdandi við álitisfólki, soleiðis at hesi skulu hava kunnleika um avgerðir sum snúgva seg um tann starvsbólk sum tey umboða.

Orsøkin til at nevnda regla hevur viðger skrivligar avgerðir frá Arbeiðseftirlitinum er, at tær munnligu fráboðanirnar oftast ikki eru so nágreinaligar sum tær skrivligu.

Viðv. § 18:
Arbeiðseftirlitið kann krevja, at kanningar verða settar í verk, bæði tá talan er um beinleiðis ilgruna viðvíkjandi viðurskiftum á einum virki, og eisini sum liður í eini meira almennari kanning ella støðugum eftirliti av viðurskiftum innan eitt virkisøki.

Sjálvt um krav ikki er sett fram frá Arbeiðseftirlitinum um kanningar, hevur arbeiðsgevarin skyldu til, møguliga eftir tilmæli frá trygdarskipanunum, at fremja kanningar á økjum, har trygdar- og heilsuviðurskiftini gera tað neyðugt.

Til dømis skulu kanningar av tekniskum hjálpartólum ikki bert fremjast áðrenn hesi verða tikin í nýtslu, men tørvur kann eisini vera á at fremja kanningar aftan á møguligar broytingar av hjálpartólunum, ella annars við jøvnum millumbilum.

Har talan er um arbeiðsvanlukku ella óvantiga nógva sjúku hjá starvsfólkunum, vil serligur tørvur ofta verða á at kanna arbeiðsviðurskiftini nærri.

Sjálvt um eitt er nevnt í lógini um hetta, skal arbeiðsgevarin sjálvur rinda fyri tær kanningar, sum nevndar eru í hesari grein.

Viðv. § 19:
Orsøkin til at henda lógargrein er sett inn, sum svarar til orðingina í donsku lógini, er, at sambært teir dómar, sum dømdir eru á hesum øki, hevur verið ivasamt, um leiðslan fyri t.d. partafeløg kundi revsast sambært teimum greinum, sum seinni í hesari lóg áseta revsingar fyri brot á ásetingarnar í lógini.

Ætlanin við hesari lógargrein er, at teir persónar, sum standa fyri leiðsluni av t.d. partafeløgum, eisini skulu kunna revsast fyri brot, teir hava framt á ásetingarnar í lógini.

Viðv. § 20:
Definitiónin av arbeiðsleiðara svarar til definitiónina í starvsmannalógini.

Tað er soleiðis ein ítøkilig avgerð í hvørjum einstøkum føri, hvør kann metast sum arbeiðsleiðari, og kann talan t.d. vera um virkisleiðarar, verkførarar, arbeiðsformenn og aðrar.

Tá talað verður um arbeiðið á virkinum ella pørtum av hesum, so kann eisini talan vera um arbeiði, sum verður gjørt uttandura.

Viðv. § 21;
Arbeiðsleiðarin skal sambært orðingini síggja til, at materiellu reglurnar í lógini verða fylgdar.

Sambært § 65 er ábyrgdin hjá arbeiðsleiðaranum ikki objektiv.

Arbeiðsleiðarin skal sambært orðingini taka tær neyðugu avgerðirnar innanfyri sítt heimildarøki, men haraftrat eigur hann at geva tilmæli um tiltøk, sum hann ikki sjálvur hevur heimild til at seta í verk, ella í hvussu er at geva arbeiðsgevaranum fráboðan um tørvin á slíkum tiltøkum.

Viðvíkjandi 2. petti er at viðmerkja, at sambært orðingina, so hevur arbeiðsleiðarin bæði rætt og skyldu til at fremja tey neyðugu tiltøk, tá talan er um trot ella brek.

Viðv. § 22:
Brot á hesa grein verða revsað sambært § 65.

Viðv. § 23:
Sambært § 65, so kunnu arbeiðsfólkini eisini revsast, um tey ikki fylgja reglunum í hesari lóg.

Sum arbeiðsfólk er at skilja, hvør tann, sum verður settur í tænastu hjá arbeiðsgevara og sum ikki hevur leiðsluheimildir.

Arbeiðsfólkið hevur ábyrgd av, at tey eisini halda tær materiellu reglurnar í lógini, umframt í møguligum kunngerðum.

Tá 1. petti sigur, at tiltøkini skulu virka sum ætlað, so ber hetta í sær, at t.d. verndartiltøk á maskinum og útsúgvingarskipanir, eins og ásett persónlig verndartiltøk, skulu nýtast.

Viðv. § 24:
Sí viðmerkingarnar til § 22.

Viðv. § 25:
Viðvíkjandi 1. petti, verður serliga hugsað um byggiarbeiði.

Viðvíkjandi 2. petti, kann talan t.d. vera um installatiónir - ella umvælingararbeiði.

Viðv. § 26:
Lógarreglan fevnir um eina og hvørja veiting, t.v.s. eisini tá talan er um ikki vinnuliga veiting av brúktum tekniskum tólum ella amboðum, t.d. tá ið hetta verður latið uttan kostnað.

Ábyrgdin áliggur í flest øllum førum á framleiðaranum ella innflytaranum, tá teir við atliti til sjálvar forhandlararnar mugu metast sum teir sakkønu.

Millumhandlarar vilja vanliga bert hava ábyrgd, tá ið serligar umstøður gera seg galdandi.

Sambært dómum í grannalondum okkara, so verður ábyrgdin heldur ikki løgd á starvsfólki hjá t.d. innflytaranum.

Sambært § 65 er revsiábyrgdin ikki objektiv.

Við teknisk hjálpartól er at skilja, t.d. maskinur, flot, tól, stigar, byggipallar, bingjur og tílíkt.

Leiðbeiningarnar eiga at vera orðaðar á føroyskum og skulu bert í undantaksføri orðast á øðrum máli, sum øll í Føroyum skilja.

Viðvíkjandi 3. petti skal viðmerkjast, at innflytari ella framleiðari, ikki bert tá ið Arbeiðseftirlitið krevur tað, men

eisini tá ið viðurskiftini annars gera tað neyðugt, hevur skyldu til at fremja tær nevndu kanningar og royndir.

Viðv. § 27:
Henda lógargrein viðvíkir bert maskinum, meðan § 26 eftir ordingini hevur eitt meira alment gildi.

annan hátt almannagóð endamál at gagna nógvum fólki. Tað er ein treyt fyri at fáa frádrátt, at gávan til einstaka felagsskapin ella stovnin fyri inntøkuárið er minst 500 kr. Frádráttur kann harafturat bara verða veittur fyri gávur, størri enn 500 kr. um árið, og frádráttur kann ikki verða veittur fyri meira enn 5.000 kr. Frádrátturin, sum er treytaður av, at landsstýrismaðurin í fíggjarmálum í tí álmanakkuárinum, gávan verður givin f, hevur góðtikið avvarðandi felagsskap o.a., at hava rætt til at taka í móti gávum, har gávuupphæddin verður drigin frá, tá ið skattskylduga inntøkan verður gjørd upp eftir reglunum í stk. 1. Fyrstu ferð, frádráttur kann verða veittur, er fyri gávur, givnar í álmanakkaárinum 1997. Umsókn um at fáa frádrátt fyri gávur, skal verða latin innan 1. oktober í álmanakkaárinum, frádrátturin fyrstu ferð skal verða.«

2) Í § 33 verður sett inn sum nýtt pkt. 15): »15) Útreiðslur fyri leypandi gjald, sum skattskyldugi hevur bundið seg at gjalda, kunnu verða drignar frá, tá ið skattskylduga inntøkan verður gjørd upp, soleiðis:

a. Úteiðslur til einsíðaðar álagdar skyldur, sum nevnt í stk. 1, kunnu verða drignar frá, um gjøldini eru til felagsskapir, stovnar o.a. ella átrúnaðarligir felagsskapir, sum góðkent eftir stk. 3. Frádráttur verður bara veittur fyri árlig gjøld, sum ikki eru meiri enn 15% av inntøkuni hjá tí, sum gevur, tá ið positiv kapitalinntøka verður roknað uppí. Fyri felagsskapir og aðrar skattskyldugar stovnar verður bara veittur frádráttur fyri árlig gjøld, sum ikki eru meiri enn 15% av skattskyldugu inntøkuni hjá tí sum gevur. Árlig gjøld, sum ikki eru meiri enn 15.000 kr., kunnu tó verða drigin frá hóast avmarkingarnar, nevndar niðanfyri.

b. Rættur at dragn frá eftir a. er treytaður av, at landsstýrismaðurin í fíggjarmálum hevur góðkent felagsskapin, stovnin o.a. ella átrúnaðarliga felagsskapin, sum hevur rætt at taka í móti leypandi gjøldum, tá ið tann, sum gevur, hevur rætt at fáa frádrátt fyri tær. Átrúnaðarligir felagsskapir kunnu verða góðkendir, eru teir her á landi. Felagsskapir, stovnar o.a. kunnu verða góðkend, eru tey her á landi, eru almannavælgerandi ella á annan hátt almannagagnlig og bróka ogn sína, eisini tað, tey fáa sum gávu, til manngóð endamál, til gransking ella til at verja náttúruna við.

c. Útreiðslur til gávur, sum eru nevndar í stk. 1, kunnu verða drignar frá, um gávan er heilt ella partvís frír bústaður hjá móttakaranum. Avmarkingarnar fyri frádrátti, sum eru nevndar í b, galda ikki í hesum føri.

d. Útreiðslur til gávurnar, sum eru nevndar í stk. 1), kunnu verða drignar frá, verða tær goldnar sum liður í avtalu, sum bindur báðar vegir. Útreiðslur til slíkar gávur kunnu tó ikki verða drignar frá, tá ið gevarin er bundin at gjalda til sjálvsognarstovnar, stovnar, grunnar o.a., sum skattskyldugi hevur sett á stovn. Tað sama er galdandi, um hjúnafelagin hjá skattskyldugu, foreldur hansara ella lívsarvingar hava sett stovnin o.a. á stovn, ella hava avgerandi ávirkan á stovnin o.a.«

§ 2.

Hend lóg fer gildi 1. januar 1999.

Stk. 2. Allur hin danski teksturin í lógini verður strikaður.

Viðmerkingar

Mælt verður til hesi stevnumið fyri at góðkenna felagsskapir, grunnar, stovnar o.a. eftir § 33, nr. 14:

1 Inngangur

1.1.Eftir § 33, nr. 14 í skattalógini kunnu, tá ið skattskylduga inntøkan verður gjørd upp, gávur verða drignar frá, tá ið prógvast kann, at tær eru givnar felagsskapum, grunnum, stovnum o.ø., sum bróka fæ til almannavælgerandi ella á annan hátt almannagagnlig endamál at gagna nógvum fólki.

1.2. Tað er treyt fyri, at frádráttur verður veittur, at gávan til einstaka felagsskapin o.a. í árinum, talan er um, er í minsta lagi 500 kr. Frádráttur verður bara veittur fyri tann partin av gávuni, sum er størri enn 500 kr. um árið, og kann ikki verða veittur fyri meira enn 5.000 kr.

1.3. Rætturin til frádráttir er treytaður av, at landsstýrismaðurin í fíggjarmálum fyri álmanakkaárið, gávan verður givin f, hevur góðkent felagsskapin o.a., sum rætt at taka í móti slíkum gávum.

1.4. Toll- og Skattstova Føroya hevur heimild sum 1. stovnur at boða teimum frá, sum hava rætt til frádrátt.

1.5. Umsóknarfreistin er 1. oktober í tí árinum, góðkenningin eftir skattalógini § 33, nr. 17 skal verða fyri. Toll- og Skattstova Føroya almannakunnger á hvørjum ári yvirlit yvir góðkendu felagsskapirnar o.a.

2. Treytir fyri at verða góðtikin
Fyri at fáa góðkenning skulu hesar treytir vera lúkaðar.

Vanlig krøv til viðtøkur og tílíkt
Í reglugerðini, stovnsskipanini ella tílíkum skal standa, at
3) peningur kann bara verða brúktur til fólk, sum eru illa fyri fíggjarliga, ella til endamál, sum millum fólk vanliga verða hildin at vera almannagagnlig.
4) eitt »likvidationsprovenu« ella avlop skal, um felagsskapurin o.a. verður avtikin, verða givin øðrum felagi, sum hevur almannavælgerandi ella á annan hátt almannagagnligt mið, og
5) feløg o.o. skulu vera her á landi, tað er, at megin parturin av nevndini og høvuðsskrivstovan eru her á landi.

2.2. Treytir fyri átrúnaðarligum felagsskapum
Átrúnaðarligir felagsskapir kunnu verða góðtiknir uttan aðrar treytir, tá ið talan er um trúarsamfeløg, samtak av trúarsamfeløgum ella felagsskapur, sum eitt ella fleiri trúarsamfeløg ella limir í trúarsamfeløgum hava sett á stovn.

Við trúarfelagsskap er at skilja samtak ella átrúnaðarligt samfelag, sum hevur gudsdýrkan sum aðalmál eftir gjøllari ásettari læru. Um ivi er um, um andalig rørsla hevur eyðkenni sum trúarsamfelag, kann spurningurin verða lagdur fyri landsstýrið (kirkjumálaráðharran) til ummælis.

2.3. Treytir fyri aðrar felagsskapir, grunnar, stovnar o.o.

2.3.1. Grunnar
Fyri grunnar, sum eru undir lóg um grunnar og ávísar felagsskapir ella lóg um vinnurekandi grunnar, verður kravt
1) at peningurin verður brúktur at gagna fólki, sum ikki landafrøðiligt ella á annan hátt er avmarkað til minni enn 5.000 fólk.
2) at tey, sum geva gávur, eru minst 150 í tali í miðal um árið í trý ár, og
3) at árliga bruttoinntøkan ella ognin (eginpeningurin) er meira enn 150.000 kr.

2.3.2. Felagsskapir
Fyri felagsskapir, sum eru sjálvstøðugir »retssubjekter«, verður hartfturat kravt.
1) at limirnir í felagsskapinum velja meirlutan í nevndini,
2) at meira enn 200 limir gjalda limagjald, og
3) at felagsskapurin ikki er limur í høvuðsfelagsskapi, sum longu er góðkendur

2.3.3. Aðrir stovnar o.o.
Aðrir stovnar o.o. kunnu verða góðkend, standa tey treytirnar í 2.3.1., og um stovnurin o.o. hevur stýri, har í minsta lagi ein limur ikki er heftur av og óvildigur av teimum, sum stovnað hava stovnin.

3. Roknskapur og eftirlit
Toll- og Skattstova Føroya, har felagsskapurin o.o. eru, hava eyga við, at tey lúka treytirnar fyri at verða góðkend.

Fyri at gera hetta skal á hvørjum ári seinast 6 mánaðir eftir, at roknskaparárið er av, verða sendur inn roknskapur til Toll- og Skattstovu Føroya. Saman við roknskapinum verða sendar inn upplýsingar um

heimstaðarkommununa, ogn, inntøku, hvussu nógvir limir gjalda limagjald, hvussu nógv geva gávur, hvussu nógv givið er í gávum, og hvussar nógv felagsskapurin hevur veitt. Til skal bera at fáa oyðublað til hetta á Toll- og Skattstovu Føroya.

Átrúnaðarligar samkomur skulu tó bara senda upplýsingar inn um, hvussu nógv er komið inn, og hvussu peningurin er brúktur.

Eru treytirnar ikki longur lúkaðar, kann góðkenningin verða tikin aftur frá næsta ári.

4. Í gild.
Grundarlagið, sum tað er grundgivið fyri her, skal galda sum rundskriv fyri § 33, nr. 17, og skal verða sett í gildi beinanvegin, tá lógin er viðtikin.
Aðrar viðmerkingar.

Føroyingar hava allar dagar givið kristiligum og manngóðum arbeiði nógv. Tað hevur ikki staðið á, tá ið fólk eru komin í neyð og skulu hava hjálp.

Sjálvboðnu felagsskapirnir hava verið sera væl stuðlaðir í Føroyum, og teir hava gjørt eitt framúrskarandi og gott arbeiði, sum eisini bróðratjóðir okkara hava notið væl av. Teir hava vunnið tjóðini virðing og sømd, sum illa kann verða mett í krónum og oyrum.

Kostnaðurin av hesum uppskotinum
Tað er trupult at meta um kostnaðin av einum slíkum uppskoti sum hesum, men hava vit í huga, at føroyingar altíð hava stuðlað væl, og hvørn húski í Føroyum letur einar 500 kr. til tílík endamál eftir lesi skipan, so verður úrslitið hetta:

Allur kostnaðurin		3,8 mió.kr.
Landskassin	2,09 mió.kr.	
Kommunurnar	1,71 mió.kr.	3,8 mió.kr.

Ulla kunnu vit í Føroyum missa tað arbeiðið, sum gjørt verður gjøgnum sjálvboðnu felagsskapirnar. Serliga nú, ið tíðirnar eru so ringar, og nógv ikki svara hvørjum sítt. Hesir felagsskapir ræða til, har almenna trygdarkervið ikki fær komið, og taka sær ofta av teimum tyngstu sosialu byrðunum, ið eingin annar hættir sær undir. Tí er tað ikki meira enn rímiligt, at løgting og landsstýri geva hesum virksemi ans og vátta tí stuðul.

Í grannalondum okkara hevur tann siður leingi verið nýttur, at fyri gávur til vælgerandi endamál er loyvdur frádráttur í sjálvuppgávuni, í Danmørk síðani 1962.

Hendan skipan kemur sera væl við hjá teimum sjálvboðnu felagsskapunum, sum veita neyðstøddum hjálp bæði innanlands og uttanlands so sum Neyðhjálp Fólkakirkjunnar, Caritas, Reyða Krossi, Krossheri Kirkjunnar o.ø.

Vit eiga ikki at standa aftan fyri bróðratjóðir okkara í Norðurlondum.

1. viðgerð týsdagin 17. mars 1998. Uppskotið verður heint í fíggjarnevndina.

Málið fall burtur sbr. stýrisskipanarlógini § 15 stk. 3, tí at løgtingsval var 30. apríl 1998, og málið ikki var liðugt viðgjørt á tingi fyri valið.

76 Uppskot til løgtingslóg um støðu løntakaranna í sambandi við avhending av virkjum

Ár 1998, hósdagin 5. mars, legði Luitjen Apol, løgtingsmaður, vegna Ingeborg Vinther, løgtingsmann fram soljóðandi

Uppskot
til
løgtingslóg um støðu løntakaranna í sambandi við avhending av virkjum

§ 1. Lógin er galdandi í sambandi við avhending av virkjum ella pørtum av virkjum.
Stk. 2. Lógin er ikki galdandi fyri havgangandi skip.

§ 2. Um so er, at eitt virki ella partur av virki verður avhendað, so tekur nýggi eigarin beinleiðis við teimum rættindum og teimum skyldum, sum tann dagin, tá avhendingin fer fram, eru galdandi, sambært:
1) sáttmála ella avtalu,
2) lógaráseting um løn og arbeiðsviðurskifti,
3) almennum ásetingum um løn og arbeiðsviðurskifti,
4) persónligum avtalum um løn og arbeiðsviðurskifti

Stk. 2. Ásetingarnar í stk. 1 eru bert galdandi fyri avtalur um lærlingaviðurskifti, um so er, at virkið eftir avhendingina verður góðkent sum lærumeistari og annars lýkur treytirnar fyri at hava lærlingar í læru.

§ 3. Uppsøgn av løntakara grundað á, at virkið verður tikið yvir av øðrum, verður ikki mett at vera rimiliga grundað í umstøðum virkisins, uttan so at uppsøgnin er grundað á fíggjarligar, tekniskar ella fyriskipanarligar grundir, sum føra við sær broytingar í starvsviðurskiftunum.
Stk. 2. Um so er, at løntakari sigur seg úr starvi orsakað av, at avhendingin av virkinum førir við sær munandi broytingar í arbeiðsumstøðunum til skaða fyri løntakaran, verður uppsøgnin at viðgera á sama hátt, sum tá talan var um, at arbeiðsgevarin segði upp løntakaran.

§ 4. Umboð fyri teir løntakarar, sum verða nervaðir av avhendingini av virkinum ella pørtum av hesum virki, varðveita eftir avhendingina rættarstøðu sína.
Stk. 2. Um avhendingin førir við sær, at løntakaraumboð ikki longur fær sæti í nevndini í tí felag, sum rekur virkið, so eru umboðini hjá løntakarunum framvegis vard eftir somu reglum, sum galdandi eru fyri løntakaraumboðini í nevndini hjá partafelagnum. Hendan vernd stendur við í eitt tíðarskeið, sum samsvarar við vanliga uppsagnarfreist hjá viðkomandi løntakara.

§ 5. Hann, sum avhendar virki ella part av virki, hevur skyldu til í ímiliga tíð frammanundan avhendingini at boða løntakaraumboðunum ella, um slík løntakaraumboð ikki eru vald á virkinum, so hvørjum einstøkum løntakara frá:
1. grundini til avhendingina,
2. løgfrøðiligu, fíggjarligu og sostalu fylgjunum fyri løntakaran og
3. hvussu umstøðurnar annars væntandi kunnu verða fyri løntakaran í sambandi við avhendingina.

Stk. 2. Um so er, at nýggi eigarin av virkinum frammanundan rekur virkið, áliggur sama skylda, sum nevnd er í stk. 1, hesum viðvíkjandi, tá talan er um teir løntakarar, sum hann hevur í starvi sínum, alt undir tí fyritreyt, at yvirtøkan av virkinum møguliga kann nerva hesar løntakarar. Fráboðanin skal fara fram, áðrenn avhendingin á nakran hátt nervar starvsviðurskiftini ella starvsrættindini hjá løntakaranum.

§ 6. Hann, sum avhendar virki sítt ella partar av hesum virki, og sum í hesum sambandi umhugsar at seta í verk tiltøk til fyrimuns fyri løntakarunum, skal í ímiliga tíð, áðrenn avhendingin fer fram, taka upp samráðingar við umboðini fyri løntakararnar, ella um slíkt umboð ikki er valt, so við allar løntakarar sínar, hetta fyri at royna at finna fram til eina avtalu við hesar løntakarar.
Stk. 2. Um tann, sum yvirtekur virkið, frammanundan rekur egið virki, eru reglurnar í stk. 1 eisini galdandi fyri hann, tá talan er um virkisyvirtøku, sum kann nerva støðuna hjá løntakarum hansara.

§ 7. Brot á §§ 5 og 6 verða revsað við sekt.
Stk. 2. Um so er, at brotið er framt av partafelag, smápartafelag, lutafelag ella líknandi, kann sektarábyrgdin áleggjast felagnum sum slíkum.

§ 8. Lógin kemur í gildi tann 1. juli 1998, og reglurnar í lógini eru galdandi fyri virkir ella partar av virkjum, sum avhendað verða aftanat 30. juni 1998.

Viðmerkingar
Í sambandi við frammanfyri nevnda lógaruppskot verður víst á, at løntakararnir í Danmark frá 1979 hava verið vardir í sambandi við avhending av virki teirra.

Lógin í Danmark varð sett í gildi grundað á, at partarnir á danska arbeiðsmarknaðinum mettu, at tørvur var á slíkari verndarlóg, tí royndirnar vístu, at løntakarin ofta var illa fyri í sambandi við slíkar virkisavhendingar.

Fjølduppsagnir vóru stundum avleiðingin av, at virkir vórðu seld, og politiski myndugleikin í Danmark var samdur við partanum á arbeiðsmarknaðinum í, at tørvur var á lóg, sum tryggjaði løntakaran móti tilvildarligari viðferð í sambandi við slíkar virkisavhendingar.

Mett verður tí náttúrligt, at lóg, sum tryggjar rættindini hjá løntakarum, eisini verður sett í gildi í Føroyum, tí vit hava, eins og í Danmark og hinum grannalondum okkara, sæð tær óheppnu avleiðingar, sum søla av virkjum her heima hjá okkum eisini hava havt við sær.

Fíggjarligar avleiðingar:
Fyri landskassan fer lógin ikki at hava fíggjarligar avleiðingar yvirhøvur.

1. viðgerð týsdagin 17. mars 1998. Uppskotið verð beint í vinnuháttarnevndina.

Málið fall burtur sbr. stýrisskipanarlógini § 15 stk. 3, tí at løgtingsval var 30. apríl 1998, og málið ikki var liðugt viðgjørt á tingi fyri valið.

77-1 Grannskoðan av almennum roknskapum

Ár 1998, hósdagin 5. mars, legði Atli Hansen, løgtingsmaður, vegna løgtingsgrannskoðaranar frum soljóðandi:

Uppskot
til
samtyktar

Vísandi til niðanfyristandandi frágreiðing samtykkir Løgtingið at góðkenna roknskapin hjá **Føroya Ídnaðargrunni** fyri fíggjarárið **1996.**

Frágreiðing frá løgtingsgrannskoðarunum:

1. Lógargrundarlag:

Føroya Ídnaðargrunnur varð settur á stovn við løgtingslóg nr. 68 frá 24. september 1970. Viðtøkurnar fyri grunnin vórðu ásettar av landsstýrinum við kunngerð nr. 7 frá 28. apríl 1971.

2. Endamál:

Endamálið við grunninum er at veita lán til íløgur í ídnaðar- og handilsfyritøkur við tí í byggju at stuðla umskipan til broytt marknaðarviðurskifti.

Av viðmerkingunum sæst, at orsøkin upprunaliga var handilstigu viðurskifti Føroya við EFTA. Ásettar eru fleiri reglur, ið hava til endamáls at tryggja, at ansað verður eftir, at tapini verða so lítil sum gjørligt.

T.d. verður ásett í § 7: »at lánið ikki má vera hægri enn neiðiligt og neyðugt er eftir eini meting av møguleikunum hjá virkinum at bera seg og lívføri tess«, og í § 11 í kunngerðini verður ásett, at virkir, sum fáa lán, koma undir »roknskaparligt og tekniskt eftirlit«.

Lógin, reglugerðin og viðmerkingarnar leggja soleiðis upp til ein varnan og tryggan útlánspolitikk, soleiðis at vandin fyri tapi av høvuðsstólinum verður so lítil sum gjørligt.

3. Fíggjarviðurskifti:

Grunnurin fekk upprunaliga eitt stovnsfæ uppá 4,5 mió.kr. og heimild at taka lán upp til 20 mió.kr. Landsstýrið hevur við kunngerðum hækkað hetta lofi stigvist til 300 mió.kr., til loftið varð avtikið í 1989, sama ár sum ein lóg varð samtykt ið heimilaði landsstýrinum at veðhalda upp til 40 mió.kr.

Burtursæð frá stovnsfænum hevur grunnurin ikki beinleiðis fingið játtað pening á fíggjarlógini fyrr enn í 1993 og í 1994.

Grunnurin hevur fingið »almenn« lán úr:

- Íløgugrunni Ídnaðarins
- Íleggingargrunninum fyri Føroyar
- Oljugrunninum.

Restskuldin av lánunum úr oljugrunninum uppá 15 mió.kr. varð strikað í 1993. Ultimo 1996 varð lánið úr leggingargrunninum 32 mió.kr. og úr íløgugrunninum 8 mió.kr.

Harumframt hevur grunnurin uttanlandslán uppá umf. 32 mió.kr., sum landskassin veðheldur fyri.

4. Yvirlit yvir rakstur 1992-1996:

Til tess at kunna løgtingið um gongdina í útreiðslunum, er gjørdur ein samandráttur úr roknskapinum fyri árið 1996 og til samanberingar eru roknskapartøl fyri árini 1992-1995 tikin við:

(mió.kr.)

	1996	1995	1994	1993	1992
Rentuinntøkur	7	11	9	19	26
Útreiðslur:					
Rentuútreiðslur	7	10	13	17	19
Aðrar útreiðslur, netto	1	1	1	5	2
Tap og avset. uppá skuldarar	-5	-2	5	33	45
	3	10	20	55	66
Ársúrslit	4	1	-11	-36	-40
Stuðul úr landskassanum	0	0	45	30	0
Úrslit	**4**	**1**	**34**	**-6**	**-40**

5. *Yvirlit yvir gongd í fíggjarstøðuni 1992-1996:*

(mió.kr.)

	1996	1995	1994	1993	1992
Aktiv:					
Útlán	58	74	93	142	183
Avsett móti tapi	22	32	40	70	64
	36	43	53	72	119
Virðisbrøv	0	45	44	0	0
Tøkur peningur	39	31	43	59	58
Yvirtiknar ognir	3	3	5	16	11
Skrivstovubygningur	6	6	6	7	11
Aktiv samanlagt	**84**	**128**	**152**	**154**	**199**
Passiv:					
Lán	75	123	147	183	224
Eginogn	9	5	4	-29	-24
Passiv samanlagt	**84**	**128**	**152**	**154**	**200**

6. *Roknskapargrannskoðanin:*

Løgtingsgrannskoðararnir hava gjøgnumgingið ársroknskapirnar og grannskoðanarprotokollirnar til tess at vissa seg um, at rætt er farið fram bókhaldsliga og roknskaparliga hjá grunninum.

Í grannskoðanarprotokollini verður aftur víst á, at § 13 í viðtøkunum er tann einasta áseting, sum gevur stýrinum nakra heimild at víkja frá teimu avtalaðu afturgjaldstíðini:

»stýrið kann minka um ella útseta afturgjalding av einstøkum avdráttum í upp til 2 ár, um so er, at serstakar grundir tala fyri hesum.«

Víst verður á, at eins og undanfarin ár er stýrið í ávísum førum farið út um hesa heimild orsakað av, at so nógv lán eru neyðlíðandi. Lán eru umløgd/niðurfryst, og í fleiri førum hevur Íðnaðargrunnurin strikað restskuldina ímóti einum kontantum inngjaldi. Orsøkin hevur í hvørjum einstøkum føri verið, at varð avtalan ikki gjørd, so fekk Íðnaðargrunnurin eitt enn størri tap upp á útlánið.

Í protokollunum fyri 1993, 1994 og 1995 mælti roknskapargrannskoðarin leiðsluni til at leggja fyri landsstýrið uppskot um, at stýrið fekk heimild - eftir neyvari meting í hvørjum føri - at strika ein part av skuldini ella at rentunullstilla skuld í eitt ávíst áramál.

Upplýst verður, at Føroya Íðnaðargrunnur hevur vent sær til Føroya Landsstýri hesum viðvíkjandi.

7. Viðmerkingar:
Í seinastu frágreiðing løgtingsgrannskoðaranna dagfest 28. februar 1997 viðvíkjandi roknskapinum hjá Føroya Íðnaðargrunni fyri árið 1995 vístu løgtingsgrannskoðararnir altur á, at roknskapargrannskoðarin ger vart við, at stýrið fyri Íðnaðargrunnurin onga heimild hevur til at gera akkordir, samstundis sum landsstýrið í øðrum samanhangi vísir á, at ein forðing fyri at avtaka grunnin er, at hesin kann gera akkordir, og mælt varð til at hesi viðurskifti verða avklárað.

Føroya Íðnaðargrunnur hevur í skrivi dagfest 24. februar 1995 biðið landsstýrið um at strika § 13 í viðtøkunum, tí ógjørligt hevur verið at fylgt hesi grein. Vísandi til kunngerð landsstýrisins nr. 103 frá 11. juni 1997 er henda grein í viðtøkunum fyri grunnin strikað.

Vinnumálastýrið hevur upplýst, at í samráði við stýrini fyri Føroya Íðnaðargrunn og Menningargrunn Íðnaðarins er umsitingin hjá báðum grunnunum løgd saman frá 1. januar 1997, og samlaða starvsfólkatalið er farið úr 5 niður í 2 fólk.

1. viðgerð týsdagin 17. mars 1998. Uppskotið varð uttan nevndarviðgerð beint beinleiðis til 2. viðgerð.

Málið fall burtur sbr. stýrisskipanarlógini § 15 stk. 3, tí at løgtingsval var 30. apríl 1998, og málið ikki var liðugt viðgjørt á tingi fyri valið.

77-2 Grannskoðan av almennum roknskapum

Ár 1998, hósdagin 5. mars, legði Atli Hansen, løgtingsmaður, vegna løgtingsgrannskoðararnar fram soljóðandi:

Uppskot
til
samtyktar

Vísandi til niðanfyristandandi frágreiðing samtykkir Løgtingið at góðkenna **roknskapin hjá Menningargrunni Íðnaðarins** fyri fíggjarárið **1996.**

Frágreiðing frá løgtingsgrannskoðarunum:
1. Lógargrundarlag:
Lógargrundarlagið var upprunaliga LI. nr. 37 frá 26. juni 1973 um menningargrunn fyri íðnað, handverk og tænastufyritøkur, við seinni broytingum.

Henda lóg fór úr gildi pr.31. desember 1995, samhæft løgtingslóg nr. 82 frá 13. juni 1995, men grunnurin er endurstovnaður sambært løgtingslóg nr. 51 frá 20. mei 1996 við gildi frá 1. januar 1996. Landsstýrið velur nevnd grunnsins og nevndin setur starvsfólk.

Við kunngerð nr. 13 frá 18. februar 1997 hevur landsstýrið, vísandi til heimild í § 4 í lógini, ásett nýggjar viðtøkur fyri grunnin.

2. Endamál:
Sambært nýggju lógini er einasta uppgáva hjá nevnd og starvsfólki at skipa fyri innkrevjing av útlánum grunnsins og fyri afturgjalding av lánum grunnsins. Heldur nevndin, at endamál grunnsins ikki er til longur, ger nevndin tilmæli til landsstýrið um at taka grunnin av.

Til tess at kunna løgtingið um tá fíggjarligu gongdina, er gjørdur ein samandráttur av roknskapinum hjá Menningargrunni Ídnaðarins fyri 1996, og til samanberingar eru roknskapartølini fyri 1992-1995 tikin við.

3. Yvirlit yvir rakstur 1992-1996:

(mió.kr.)

	1996	1995	1994	1993	1992
Rentuinntøkur	5,3	7	10	15	23
Rakstrarútreiðslur	-1,1	-1	-2	-5	-4
Rentuútreiðslur	-6,9	-10	-13	-20	-21
Úrslit av vanligum rakstri	**-2,7**	**-4**	**-5**	**-10**	**-2**
Burturleggingar og avskrivingar av lánum	2,3	6	1	4	-103
Úrslit eftir burturlegg. og avskrivingar	**-0,4**	**2**	**-4**	**-6**	**-105**
Játtan á fíggjarlógini	0,0	0	5	65	75
Ársúrslit	**-0,4**	**2**	**1**	**59**	**-30**

4. Yvirlit yvir gongd í fíggjarstøðuni 1992-1996:

(mió.kr.)

	1996	1995	1994	1993	1992
Aktiv					
Útlán	16	21	39	66	114
Avsett móti tapi	3	7	26	47	79
	13	**14**	**13**	**19**	**35**
Virðisbrøv í landsbankanum	0	14	14	0	0
Innistandandi í peningastovnum vm.	65	82	95	149	92
Skrivstovubygningur	7	7	7	9	9
Aktiv samanlagt	**85**	**117**	**129**	**177**	**136**
Passiv					
Skuld:					
Uttanlandslán	79	100	118	166	176
Íleggingargrunnurin fyri Føroyar	1	2	2	2	2
Onnur lán v.m.	1	2	0	0	10
	81	**103**	**120**	**168**	**188**
Eginogn, fróknað kursmun v.m.	4	14	9	9	-52
Passiv samanlagt	**85**	**117**	**129**	**177**	**136**

5. Roknskapargrannskoðanin:
Løgtingsgrannskoðararnir hava gjøgnumgingið ársroknskapirnar og grannskoðanarprotokollirnar til tess at vissa seg um, at rætt er farið fram bókhaldsliga og roknskaparliga hjá stovninum.

6. Viðmerkingar:
Løgtingsgrannskoðararnir hava áður víst á, at tað ikki var skilagott, at grunnurin hevði nógvan pening inni-standandi og samstundis fleiri høgt rentað lán. Henda støða er broytt, og grunnurin upplýsir, at skuldin ultimo 1997 er uml. 30 mió.kr.

Raksturin av grunninum er lutfalsliga dýrur orsakað av teim høgu húsaútreiðslunum. Grunnurin eigur 1/3 av bygninginum, og løgtingsgrannskoðararnir hava áður mælt landsstýrinum til at kanna, um betri nýtsla fæst burtur úr hølunum. Løgtingsgrannskoðararnir eru kunnugir um, at Undirvísingar- og Mentamálastýrið og Menningargrunnurin hava tikið upp tingingar um henda spurning.

Vinnumálastýrið hevur upplýst, at í samráð við stýrini fyri Føroya Íðnaðargrunn og Menningargrunn Íðnaðarins er umsitingin hjá báðum grunnunum lagd saman frá 1. januar 1997, og samlaða starvsfólkatalið er fartð úr 5 niður í 2 fólk.

1. viðgerð týsdagin 17. mars 1998. Uppskotið varð uttan nevndarviðgerð beint beinleiðis til 2. viðgerð.

Málið fall burtur sbr. stýrisskipanarlógini § 15 stk. 3, tí at løgtingsval var 30. apríl 1998, og málið ikki var liðugt viðgjørt á tingi fyri valið.

77-3 Grannskoðan av almennum roknskapum

Árið 1998, hósdagin 5. mars, legði Atli Hansen, løgtingsmaður, vegna løgtingsgranskoðararnar fram soljóðandi:

Uppskot
til
samtyktar

Vísandi til niðanfyristandandi frágreiðing samtykkir Løgtingið at góðkenna roknskapirnir hjá **Apoteksverki Føroya** fyri fíggjarárið **1996**.

Frágreiðing frá løgtingsgranskoðarunum:
1. Lógargrundarlag:
Apoteksverk Føroya er stovnur undir Føroya landsstýri og virkar eftir
- Ll. nr. 104 frá 5. september 1988 um apoteksverkið og heilivág, sum broytt við lóg nr. 54 frá 8. mei 1991.
- kunngerð nr. 82 frá 11. august 1989 um heilivágsskrá
- kunngerð nr. 84 frá 11. august 1989 um dygd í heilivági
- kunngerð nr. 12 frá 11. november 1994 um fyrimyndarreglur á heilivági, seinni broytt við kunngerð nr. 127/1996 og 16/1997
- kunngerð nr. 112 frá 1. juli 1992 um hydrogenperoxid
- kunngerð nr. 113 frá 1. juli 1992 um áseting av søluprísi á heilivági, seinni broytt við kunngerð nr. 17/1997
- kunngerð nr. 145 frá 2. juli 1993 um skrá yvir heilivágsløg, sum eru heimilað tilskot, seinni broytt við kunngerð nr. 136/1996
- bekendtgørelse nr. 698 frá 31. august 1993 um »euforiserende stoffer«
- kunngerð nr. 13 frá 31. januar 1994 um brúkarainnpakning til sertilbúningar heilivág
- kunngerð nr. 14 frá 31. januar 1994 um forskriftir og forskriftaskyldu o.a.m., seinni broytt við kunngerð nr. 17/1996 og 32/1997
- kunngerð nr. 69 frá 26. juni 1991 um skrásetingarráð viðvíkjandi farmaseutiskum tilhúningi.
- Ll. nr. 51 frá 13. mei 1997 um broyting í Ll. um evnisskráir hjá almennum myndugleikum
- kunngerð nr. 151 frá 24. november 1997 um stuðul til heilivág eftir forsorgarlógini, fólkapensiónslógini og avlamispensiónslógini
- Ll. nr. 176 frá 30 desember 1997 um broyting í Ll. um meirvirðisgjald

2. Endamál:
Samsvarandi § 1 í løgtingslóg nr. 104 frá 5. september 1988 um apoteksverkið og heilivág við seinni broytingum er Apoteksverkið stovnur undir Føroya Landsstýri.

Samsvarandi § 29 í lógini hevur bert apoteksverkið loyvi til at framleiða, flyta inn, flyggja út, hava á goymslu, handla við og pakka heilivág, um so er, at eitt nú annað er ásett í lógini ella av reglum ásettum við heimild í lógini um apoteksverkið og heilivág.

Landsapotekarin hevur smb. § 50 eftirlit við at lógin og ásetingarnar við heimild í lógini verða yvirhildnar.

3. Fíggjarviðurskifti:
Sambært § 6 í lógini um apoteksverkið og heilivág setir landsstýrið ein apotekara á hvørjum apoteki. Sambært § 8 skipar apotekarin fyri rakstrinum av apotekinum og hevur ábyrgd av, at virkið verður útint forsvarliga og samsvarandi galdandi ásetanum og givnum fyriskipanum.

Sambært § 9 ásetur landsstýrið reglur um heimildir og heiti til starvsfólk, sum starvast á apotekinum.

Landsstýrið ásetur sambært § 13 reglur um virksemið hjá teim ymsu apotekseindunum og kann áseta reglur um rakstur teirra.

Sambært § 18 í lógini ásetur landsstýrið reglur fyri útroknan av søluprísi.

Sambært § 22 eru Apoteksgrunnurin, landsapotekarin og apotekini ein búskaparlig eind, tó at tey hava hvør sín roknskap. Fíggjarætlanaruppskot og takstuppskot fyri apoteksverkið verða viðgjørd av landsapotekaranum og apotekarunum í felag, og verða við fylgisviðmerkingum teirra send landsstýrinum. Fíggjarætlanaruppskotið verður sent landsstýrinum á hvørjum ári í seinasta lagi til ta tíð, landsstýrið hevur ásett.

Apoteksgrunnurin eigur sambært § 23 vørugoymslurnar, innbúgvið og føstu ognirnar hjá apoteksverkinum. Grunnurin er undir landsstýrinum og hevur til endamáls at fíggja apoteksverkið, og avlopið frá apoteksrakstrinum fellur til apoteksgrunnin.

Sambært § 24 er landsstýrinum heimilað, vegna apoteksgrunnin, at taka tey lán, sum vørtukeyp fastognarkeyp, bygging og umbygging til hvørja tíð krevja.

Til tess at kunna løgtingið um ta fíggjarligu gongdina, er gjørdur ein samandráttur av ársroknskapinum hjá Apoteksverki Føroya fyri 1996, og til samanberingar eru roknskapartølini fyri 1993-1995 tikin við.

4. Yvirlit yvir rakstur 1993-1996:

(Túsund kr.)

	1996	1995	1994	1993
Inntøkur:				
Søla kontant	25,1	23,9	22,6	21,6
Søla kredit	58,2	53,4	51,1	53,1
Avsláttur	-0,5	-0,6	-0,6	-0,7
Søla alt	82,7	76,7	73,1	74,0
Vørunýtsla	55,4	52,1	52,0	50,2
Bruttoviuningur	**27,3**	**24,6**	**21,1**	**23,8**
Bruttovinningur í %	33,0%	32,1%	28,9%	32,2%
Lønir	14,1	14,2	14,2	14,3
Rakstur av fastari ogn	1,3	1,2	1,4	1,2
Kostnaðir	4,5	4,6	4,2	4,0
Landsapotekarin	1,2	1,1	1,1	1,0
Útreiðslur alt	21,1	21,1	20,9	20,5

Úrslit áðrenn rentur	**6,1**	**3,5**	**0,2**	**3,3**
Rentuinntøkur	2,4	2,0	1,8	2,2
Rentur til Apoteksgrunnin	0,0	0,0	0,0	0,0
Úrslit áðrenn avskrivingar	**8,5**	**5,5**	**2,0**	**5,5**
Avskrivingar	1,2	1,4	2,1	2,9
Ársúrslit	**7,2**	**4,1**	**-0,1**	**2,6**

5. Yvirlit yvir gongd í fíggjarstøðuni 1993-1996:

(milliónir kr.)

	1996	1995	1994	1993
Aktiv:				
Kassa-, banka- og giropeningur v.m.	38,6	29,0	30,9	27,1
Debitorar	12,9	13,5	8,3	11,1
Vørugoymsla	11,8	12,3	10,9	12,6
Innbúgv	0,7	0,8	1,1	1,7
Bilar	0,1	0,1	0,2	0,2
Fastar ognir	11,6	12,2	12,8	12,9
Aktiv alt	75,7	67,9	64,2	65,6
Passiv:				
Kreditorar	8,6	8,0	8,4	9,7
Millumrokning við apoteksgrunnin:				
Saldo primo	59,9	55,8	55,9	52,0
Keyp av bygningi	0,0	0,0		1,3
Rentur til grunnin	0,0	0,0	0,0	0,0
	59,9	55,8	55,9	53,3
Ársúrslit	7,2	4,1	-0,1	2,6
	67,1	59,9	55,8	55,9
Inngoldið í Apoteksgrunnin	0,0	0,0	0,0	0,0
Saldo ultimo	67,1	59,9	55,8	55,9
Passiv alt	75,7	67,9	64,2	65,6

6. Íløgurákseni árini 1993-1996:

Í tíðarskeiðinum 1993 til 1996 eru gjørdar íløgur í bilar, innbúgv (serliga EDV) og bygningar. Hesar íløgur eru býttar soleiðis:

(1.000 kr.)

	1996	1995	1994	1993
Innbúgv og edv	483	308	821	1.488
Bilar	0	0	109	47
Føst ogn	0	12	501	3.185
Alt	**483**	**320**	**1.431**	**4.720**

7. Apoteksgrunnurin:

Samb. § 23 í løgtingslóg um apoteksverk og heilivág er apoteksgrunnurin undir landsstýrinum og hevur til endamáls at tíggja apoteksverkið. Apoteksgrunnurin eigur ognirnar hjá apoteksverkinum, og avlopið hjá apoteksverkinum fellur til grunnin.

Roknskapur grunsins verður førdur av Føroya Gjaldstovu, og frámgongur av landsroknskapinum sum ein internur grunnur. Til tess at kunna løgtingið um tíggjarligu gongdina í grunninum, er gjørdur ein samandráttur av roknskapunum frá 1993-1996:

(mió kr.)

	1996	***1995***	***1994***	***1993***
Virði:				
Millumrokning við Apoteksverkið	*67,1*	*59,9*	*55,8*	*55,9*
Innistandandi í peningastovnum	*0,0*	*0,0*	*0,0*	*16,2*
Millumrokning við landskassan	*16,0*	*16,0*	*16,1*	*-0,1*
	83,1	***75,9***	***71,9***	***72,0***
Eginogn:				
Saldo 1. januar	*75,9*	*71,9*	*72,0*	*68,5*
Rentuinntøkur frá Apoteksverkinum	*0,0*	*0,0*	*0,0*	*0,0*
Rentuinnt. av innistandandi í peningastovnum	*0,0*	*0,0*	*0,0*	*0,0*
Ársúrslit Apoteksverksins	*7,2*	*4,1*	*-0,1*	*2,6*
Lønir, samsýningar o.a.	*-*	*-0,1*	*-0,1*	*-0,1*
	83,1	***75,9***	***71,9***	***72,0***

Í seinastu frágreiðing frá løgtingsgrannskoðarunum varð víst á, at Apoteksgrunnurin seinasta árini hevur havt góðar 16 mió.kr. innistandandi í peningastovnum. Sambært bókhaldinum á gjaldstovuni vórðu hesar konti gjørdar upp í februar 1994, og peningurin fluttur í landsbankan. Síðani er ongin renta góðskrivað Apoteksgrunninum. Løgtingsgrannskoðararnir bóðu gjaldstovuna um eina frágreiðing hesum viðvíkjandi.

Gjaldstovan upplýsti, at samb. § 3 í løgtingslóg nr. 48 frá 28. apríl 1992 um innlán í Landsbankan og lán úr Landsbankanum, so skuldi tann peningur, sum landskassin og landskassans grannar áttu innistandandi í peningastovnunum í Føroyum, tá ið lógin fekk gildi, verða settir sum innlán í Landsbankanum. Apoteksgrunnurin hevur verið tulkaður sum ein landskassa grunnur/internur grunnur, t.v.s. ein partur av landskassanum, og onki er í §§ 23 og 24 í lóg nr. 104 frá 5. september 1988 um apoteksverk og heilivág, sum sigur tað øvugta.

Um orsøkina til, at ongin renta síðani er góðskrivað Apoteksgrunninum, upplýsti gjaldstovan, at smb. omanfyristandandi tulking er talan um tøka pening landskassans. Renta av øllum innistandandi landskassans í Landsbankanum verður tilskrivað landskassanum. Um grunnurin skal hava rentuinntøkur av millumrokning við landskassan - millumrokningin er komin í staðin fyri at hava peningin standandi á bók - so skal hetta gerast við eini játtan á tíggjarlógini, har tingið játtar Apoteksgrunninum eina ávísa renta.

Landsapotekaraembætið var ikki samt við omanfyri standandi tulking og vísti á, at smb. § 22 í apotekaralógini eru Apoteksgrunnurin, landsapotekarin og apotekini ein búskapurlig eind. Eftir § 23 er Apoteksgrunnurin undir landsstýrinum, og hevur til endamáls at tíggja Apoteksverkið. Metti vard, at í hesum liggur greitt, at grunnurin er ein eksternur grunnur, sum er loysur av landskassanum (uttan ogn landskassans), á sama hátt sum reiðupeningur apotekanna. Landsapotekaraembætið helt tað tí ikki vera rætt, tá ið renta av innistandandi í Landsbankanum varð goldin landskassanum, hon átti sjálvsagt at verið goldin Apoteksgrunninum.

Uppá fyrispurning frá løgtingsgrannskoðarunum hevur Almanna- og Heilsumálastýrið eisini viðgjørt spurningin, og er, í skrivi dagfest 24. februar 1998, komið til sama niðurstøðu sum landsapotekarin, vísandi til løgtingslóg um Apoteksverkið og heilivág og árulanga siðvenju.

8. Roknskapargrannskoðanin:
Løgtingsgrannskoðararnir hava gjøgnumgingið ársroknskapin og grannskoðanarprotokollina til tess at vissa seg um, at rætt er farið fram bókhaldsliga og roknskaparliga hjá stovninum.

9. Viðmerkingar:
Í seinasta frágreiðing frá løgtingsgrannskoðarunum dagfest 28. februar 1997, tá roknskapurin hjá Apoteksverki Føroya fyri 1995 varð lagdur fyri tingið til samtyktar, mæltu løgtingsgrannskoðararnir landsstýrinum til at fáa greiðu á viðurskiftunum viðvíkjandi Apoteksgrunninum, og hvussu Apoteksverkið, sum stovnur undir landsstýrinum, framyvir verður tikið við á fíggjarlógina. Í skrivi dagfest 5. mars 1997 upplýsti Almanna- og heilsudeildin, at ætlanin var at taka virksemið hjá Apoteksverki Føroya við á komandi fíggjarlóg. Somuleiðis varð sagt, at Almanna- og Heilsudeildin ikki var liðug at umráða, hvat skuldi henda við Apoteksgrunninum. Ætlanin var í hvussu so er ikki beinleiðis at avtaka grunnin, men heldur at dagføra støðuna til nútíðar tørv.

Í skrivi dagfest 24. februar 1998 upplýsir Almanna- og heilsumálastýrið, at arbeitt framvegis verður við, hvussu Apoteksverkið/grunnurin skal verða skipaður í framtíðini. Tað er tó ikki møguligt at avtaka Apoteksgrunnin, av tí at hesin er staðfestur við løgtingslóg um Apoteksverkið og heilivág.

Apoteksverkið varð tikið við á § 6 á fíggjarlógini fram til 1992 og við eykafíggjarlógini fyri 1992 duttu játtanir undir § 6 burtur. § 6 hevur í mong ár verið nýtt sum játtanargrein til stovnar, sum í stóran mun fíggja sítt virksemi við »egnum« inntøkum ella gjøldum. Fleiri av hesum stovnum hava sín egna likviditet, og nakrir hava eisini sjálvir umsitið síni lán. Hesir stovnar hava sostatt havt eitt leysari tilknýti til fíggjarlóg, landsbókhald og landskassans gjaldføri; men talan er um stovnar undir landsstýrinum, og hesir skulu tí hava fíggjarheimild frá løgtinginum til at halda inntøkur og útreiðslur. Løgtingsgrannskoðararnir hava síðani spurt landsstýrið, um tað var í tráð við stýrisskipanarlógina, at teledjonverkið og aðrir líknandi stovnar ikki longur vórðu tiknir við á fíggjarlógina. Landsstýrið hevur svarað, at hetta ikki er í tráð við stýrisskipanarlógina. Allir stovnar, sum vóru undir § 6, eru síðani komnir við aftur á fíggjarlógina, men ikki Apoteksverkið.

Løgtingsgrannskoðararnir meta, at Apoteksverkið eigur at verða tikið við aftur á fíggjarlógina, so løgtingið fær innlit í, og fær høvi til, at taka støðu til og játta ætlaða fíggjarliga virksemið í einum fíggjarári hjá Apoteksverkinum og Apoteksgrunninum. Í hesum sambandi verður eisini mælt til at leggja broytingaruppskot fyri tingið viðvíkjandi Apoteksgrunninum, so tað verður løgtingið, sum tekur støðu til verandi ivaspurningar og áseting nærri reglur um, hvussu hesin skal skipast, ella í øðrum lagi, um grunnurin skal takast av.

1. viðgerð týsdagin 17. marts 1998. Uppskotið varð uttan nevndarviðgerð beint beinleiðis til 2. viðgerð.

Málið fall burtur sbr. stýrisskipanarlógini § 15 stk. 3, tí at løgtingsval var 30. apríl 1998, og málið ikki var liðugt viðgjørt á tingi fyri valið.

77-4 Grannskoðan av almennum roknskapum

Ár 1998, hósdagin 5. mars, legði Atli Hansen, løgtingsmaður, vegna løgtingsgrannskoðararnar fram soljóðandi:

Uppskot
til
samtyktar

Vísandi til niðanfyristandandi frágreiðing samtykkir Løgtingið at góðkenna roknskapin hjá **Útvarpi Føroya** fyri fíggjarárið **1996**.

Frágreiðing frá løgtingsgrannskoðarunum:

1. Lógargrundarlag:
Útvarp Føroya varð sett á stovn við Ll. nr. 23 frá 28.3.1956 við broytingum í Ll. nr. 28 frá 17.5.1961, Ll. nr. 22 frá 9.4.1964, Ll. nr. 32 frá 27.5.1968, Ll. nr. 182 frá 18.12.1992, Ll. nr. 88 frá 13.6.1995, Ll. nr. 130 frá 3.12.1996, Ll. nr. 60 frá 14.5.1997

Arbeiðið hjá útvarpsnevndini er ásett við Ll. nr. 11 frá 14.2.1957 um útvarpsnevnd við broytingum í Ll. nr. 38 frá 25.5.1963, Ll. nr. 25 frá 10.6.1971, Ll. nr. 87 frá 13.6.1995, Ll. nr. 171 frá 22.12.1995 og Ll. nr. 23 frá 25.3.1996. Lógin fór úr gildi 1. mei 1996.

Nýggj lóg um útvarpsnevnd varð lýst við Ll. nr. 66 frá 20.5.1996, Ll. nr. 140 frá 22.12.1996 við gildi fram til 1. januar 1998 og aftur við Ll. nr. 162 frá 29.12.97 við gildi fram til 1. mars 1998.

Vísandi til § 11 í løgtingslóg nr. 23 frá 28. mars 1956 (um skipan av eftirliti við útvarpinum) og til Ll. nr. 11 frá 14.2.1997 um útvarpsnevnd lýsti landsstýrið í kunngerð nr. 51 frá 18. juli 1997 reglugerð um starv útvarpsnevndarinnar.

2. Endamál:
Sambært § 2, 1. stk. í reglugerð um starv útvarpsnevndarinnar fyrisetur nevndin reglur, ið hon heldur vera neyðugar, við tí endamáli at tað, sum útvarpað verður, hevur fjølbroytt, mentunarligt og upplýsandi innihald, og at hugsanarfrælsi, rættsinni og javnaður móti øllum flokkum og stevnum í almennum málum, vinnustevnum, feløgum og einstakum monnum skulu ríða í útvarpinum.

3. Fíggjarviðurskifti:
Sambært lóg nr. 23 frá 28.3.1956 við seinni broytingum, setir landsstýrið fyristøðumann, ið hevur dagliga stýri útvarpsins eftir reglugerð, ið landsstýrið fyrisetur. Landsstýrið setur starvsfólk eftir tilmæli fyristøðumansins. Lønirnar hjá fyristøðumanni og starvsfólki verða ásettar av landsstýrinum sambært § 2.

Smb. § 3 skal gjald rindast til útvarpið av hvørjum radiomóttakara í landinum. Landsstýrið fyrisetur gjaldið fyri eitt ár í senn.

Sambært § 5 í lógini ger fyristøðumaðurin uppskot til fíggjaretlan fyri fíggjartíðið og sendir landsstýrinum uppskotið innan 1. januar. Fíggjaretlanin verður tikin sum serstakur liður í fíggjarlóg landsins. Inntøkur útvarpsins verða bert at nýta til útvarpsendamál.

Sambært § 6 í reglugerðini heitir landsstýrið á nevndina og fær umsagnir viðvíkjandi setan av útvarpsstjóra og starvsfólki, fíggjaretlan útvarpsins, støddina á útvarpsgjaldi v.m.

Sambært § 2 hevur landsstýrið allan avgerðarrættin fyri øllum fíggjarligum, útvarpinum viðvíkjandi.

Til tess at kunna løgtingið um ta fíggjarligu gongdina hjá Útvarpi Føroya er gjørdur ein samandráttur av ársroknskapunum fyri 1996, og til samanberingar eru roknskapartølini fyri 1992-1995 tikin við.

4. Yvirlit yvir nøkstur 1992-1996:

(mió.kr.)

	1996	1995	1994	1993	1992
Inntøkur					
Útvarpsgjald	13.349	13.427	12.333	13.923	15.715
Kunngerðir	4.494	4.532	3.491	3.965	5.290
Kvøldtíðmar	65	69	99	112	112
Rentur	542	537	632	1.059	1.481
Ymiskt	227	144	387	242	58
	18.677	18.709	16.943	19.301	22.656
Vinningur V-4	2.336	2.726	2.754	2.786	2.414
	21.013	21.435	19.697	22.087	25.070
Útreiðslur					
Útvarpsstøðirnar og studiið	370	2.007	1.956	2.348	1.481
Útreiðslur viðv. útvarping:					
lønir	6.919	6.065	6.264	6.483	6.819
samsýningar	2.557	2.090	2.692	2.487	2.381
annað	3.097	2.400	2.992	3.177	3.197
Stjórnarútreiðslur:					
lønir	1.839	1.645	1.692	1.809	1.819
annað	2.603	2.437	2.291	2.494	2.361
Útvarpsnevndin	87	44	52	60	49
Avskr. av húsi	1.663	1.124	646	580	1.735
Avskrivingar av øðrum ogntum.	1.408	2.411	0	0	2.007
Avskrivingar av eftirstøðum	331	230	468	585	519
Rentur fruknað kurstap	106	345	2.363	2.609	2.507
	20.981	20.798	21.416	22.632	24.875
Úrslit	**32**	**637**	**-1.719**	**-545**	**195**

5. Yvirlit yvir gongd í fíggjarstøðuni 1992-1996:

(mió.kr.)

	1996	1995	1994	1993	1992
Aktiv					
Innistandandi í peningastovnum	11.949	12.128	8.853	12.668	17.920
Skuldarar:					
eftirstøður f.útvarpsgjald	3.868	4.543	5.715	8.031	7.392
eftirst. fyri aðrar skuldarar.	1.260	783	728	938	921
Umferðarfæ	17.077	17.454	15.296	21.637	26.233
Útvarpshúsið	9.104	9.662	10.368	10.819	11.102
Aðrar ognir	0	0	1.563	387	0
Støðisfæ	9.104	9.662	11.931	11.206	11.102
Aktiv samanlagt	**26.181**	**27.116**	**27.227**	**32.843**	**37.335**

Passiv					
Ogbarar	1.110	1.231	1.101	1.400	2.543
Lán	660	1.507	2.125	5.230	8.234
Fremmand fíggjan	1.770	2.738	3.226	6.630	10.577
Eginogn:					
saldo pr. 1.1.	23.578	22.941	24.660	25.205	20.379
úrslit	32	637	-1719	545	195
eftirgeving av millum-rokn.	0	-.-	-	-	4.631
	23.610	23.578	22.941	24.660	25.205
avsett til útvarpshús	0	0	0	0	0
avsett til umvælan	0	0	260	753	753
avsett til ymisk prosjekt	800	800	800	800	800
Egintígging	24.410	24.378	24.001	26.213	26.758
Passiv samanlagt	**26.181**	**27.116**	**27.227**	**32.843**	**37.335**

6. *Roknskapargrannskoðanin:*
Løgtingsgrannskoðararnir hava gjøgnumgingið ársroknskapin og grannskoðanarprotokollina, til tess at vissa seg um at ratt er farið fram bókhaldsliga og roknskaparliga hjá stovninum.

Aftur í 1996 hevur roknskapargrannskoðanin, eins og árini frammanundan m.a. vísandi til nýtta roknskaparháttin viðvíkjandi avskrivingum og roknskaparuppsetan annars, víst á, at neyðugt er at fáa eina fasta skipan fyri, hvussu almennir roknskapir verða uppsettir.

7. *Viðmerkingar:*
Løgtingsgrannskoðararnir staðfesta, at fløgur framhaldandi verða útreiðsluførdar/avskrivaðar í tann tíl úrslitið av vanligu rakstrinum, so nettoúrslitið verður umleið 0. Løgtingsgrannskoðararnir meta ikki, at hesin roknskaparháttur skal halda fram. Virksemi útvarpsins er tikið við á fíggjarlógina fyri 1997, og framyvir koma viðurskiftini viðv. fløgum/avskrivingum og avdráttum vónandi í eina fasta legu.

1. viðgerð týsdagin 17. mars 1998. Uppskotið verð uttan nevndarviðgerð beint beinleiðis til 2. viðgerð.

Málið fall burtur sbr. stýrisskipanarlógini § 15 stk. 3. tí at løgtingsval var 30. apríl 1998, og málið ikki var liðugt viðgjørt á tingi fyri valið.

77-5 Grannskoðan av almennum roknskapum

Ár1998, hósdagin 5. mars, legði Atli Hansen, løgtingsmaður, vegna løgtingsgrannskoðararnar fram soljóðandi:

Uppskot
til
samtyktar

Vísandi til niðanfyristandandi frágreiðing samtykkir Løgtingið at góðkenna roknskapin hjá **Sjónvarpi Føroya** fyri fíggjarárið **1996.**

Frágreiðing frá løgtingsgrannskoðarunum:

1. Lógargrundarlag:
Tað almenna sjónvarpið varð sett á stovn sambært løgtingslóg nr. 77 frá 21. mei 1982 við broytingum í Ll. nr. 183 frá 18.12.1992, Ll. nr. 85 frá 13.6.1995, Ll. nr. 172 frá 22.12.1995 og Ll. nr. 24 frá 25.03.1996. Lógin fór úr gildi 31. desember 1996.

Nýggj lóg um sjónvarp varð lýst við Ll. nr. 141 frá 20. desember 1996 við gildi fram til 1. januar 1998 og aftur við Ll. nr. 162 frá 29.12.97 við gildi fram til 1. mars 1998.

Sambært § 6 í lógini verður lóg um útvarpsnevnd og reglugerðin um starv útvarpsnevndarinnar tilsvarandi at galda fyri sjónvarpsnevndina.

2. Endamál:
Sambært § 1 í lógini frá 1982 hevur løgtingið einkarrætt til sjónvarpssendingar og setir á stovn Sjónvarp Føroya. Sjónvarp Føroya hevur til endamáls at hava objektivan, sakligan og upplýsandi tíðindaflutning og sendingar annars, ið varðveita og fjálga um føroyska mentan, átrúnað og siðlæru. Sambært nýggju lógini um sjónvarp er einkarrætturin avtikin.

3. Fíggjarviðurskifti:
Eftir tilmæli frá sjónvarpsnevndini setir landsstýrið í starv ella loysir úr starvi fyristøðumann, ið hevur dagligu leiðslu sjónvarpsins um hendi.

Sambært § 4 í gomlu lógini skal til sjónvarpið rindast gjald av hvørjum sjónvarpsmóttakara í landinum og umborð í skipum, ið eru skrásett í Føroyum.

Í nýggju lógini um sjónvarp er hetta broytt til, at landsstýrismaðurin í kunngerð ásetir nærri reglur um, hvør skal rinda sjónvarpsgjaldið.

Fyristøðumaðurin ger uppskot til góðkenningar til fíggjaretlan fyri fíggjarárið og sendir landsstýrinum uppskottið. Inntøkur sjónvarpsins verða bert at nýta til sjónvarpsendamál.

Til tess at kunna løgtingið um ta fíggjarligu gongdina hjá Sjónvarpi Føroya er gjørdur ein samandráttur av ársroknskapinum fyri 1996 og til samanberingar eru roknskapartølini fyri 1992-1995 eisini tikin við.

4. Yvirlit yvir rakstur 1992-1996:

	1996	***1995***	***1994***	***1993***	***1992***
					(mió.kr.)
Inntøkur					
Sjónvarpsgjald	12.789	*13.049*	*13.202*	*12.956*	*12.636*
Lýsingar	3.057	*3.072*	*2.984*	*2.824*	*3.006*
Tekstvarp	0	*33*	*0*	*0*	*0*
Sektarpeningur	114	*102*	*121*	*134*	*259*
Søla og leiga av sjónbondum	102	*68*	*81*	98	*155*
Rentuinntøkur	114	*207*	*150*	228	*163*
Inntøkur alt	16.175	*16.530*	*16.538*	16.240	*16.219*
Útreiðslur					
Sjónvarpsstøðirnar og studiið	707	*1.933*	*1.662*	*1.776*	*2.130*

Útreiðslur viðv. sendingum:					
lønir	6.873	*6.624*	*6.792*	*6.784*	*7.394*
samsýningar	1.416	*1.151*	*894*	*1.109*	*1.019*
annað	3.695	*3.190*	*3.638*	*3.282*	*3.715*
Stjórnarútreiðslur:					
lønir	1.758	*1.842*	*1.849*	*1.759*	*2.005*
annað	1.998	*2.146*	*1.969*	*1.639*	*1.926*
Sjónvarpsnevndin	106	*67*	*64*	*74*	*59*
Avskr. og -setingar av eftirstøðum	0	*300*	*650*	*1.600*	*1.400*
Rentuútreiðslur	0	*0*	*0*	*0*	*0*
Útreiðslur alt	16.554	*17.254*	*17.518*	*18.023*	*19.648*
Rentuútreiðslur	0	*0*	*0*	*0*	*0*
Rakstrarúrslit	-379	*-723*	*-980*	*-1.783*	*-3.429*
Landskassastuðningur	530	*734*	*1.000*	*2.000*	*3.476*
Samlað úrslit	**151**	***11***	***20***	***217***	***47***

5. Yvirlit yvir gongd í liggjarstøðuni 1992-1996:

	1996	***1995***	***1994***	***1993***	***1992***
Aktiv					
Innistandandi í peningastovnum	*1.775*	*2.074*	*2.248*	*2.505*	*1.660*
Skuldarar:					
skuldarar	820	*888*	*866*	*718*	*1.655*
Aktiv samanlagt	**2.596**	***2.962***	***3.114***	***3.223***	***3.315***
Passiv					
Ognarar	1.910	*2.429*	*2.591*	*2.219*	*2.028*
Lán Føroya landsstýri	0	*0*	*0*	*500*	*1.000*
Fremmand liggjan	1.910	*2.429*	*2.591*	*2.719*	*3.028*
Eginogn:					
saldo pr. 1.1	534	*523*	*503*	*287*	*240*
flutt frá rakstri	151	*11*	*20*	*217*	*47*
Eginliggjing	685	*534*	*523*	*504*	*287*
Passiv samanlagt	**2.596**	***2.963***	***3.114***	***3.223***	***3.315***

6. Rokskapargranskoðanin:

Løgtingsgranskoðararnir hava gjøgnumgingið ársrokskapin og granskoðanarprotokollina til tess at vissa seg um, at rætt er farið fram bókhaldsliga og rokskaparliga hjá stovninum. Rokskapargranskoðanin visir á, at í rokskapinum eru kr. 630.000 avsettar sum útreiðslur til Danmarks Radio fyri lundingar, men at henda upphædd helst verður afturført.

7. Viðmerkingar:

Nýtti rokskaparhátturin í útvarpinum og sjónvarpinum er sera ymiskur, tá ræður um fløgur, liggingi, avskrivingar og avsetingar. Virksemið hjá sjónvarpinum og útvarpinum er tikið við á liggjarlógina fyri 1997 eftir somu meginreglum, og framyvir koma viðurskiftini viðvíkjandi fløgum, liggingi, avskrivingum v.m. vónandi í eina fasta legu.

1. viðgerð týsdagin 17. mars 1998. Uppskotið varð undan nevndarviðgerð beint beinleiðis til 2. viðgerð.

Málið fall burtur sbr. stýrisskipanarlógini § 15 stk. 3, tí at løgtingsval var 30. apríl 1998, og málið ikki var liðugt viðgjørt á tingi fyri valið.

77-6 Grannskoðan av almennum roknskapum

Á r1998, hósdagin 5. mars, legði Atli Hansen, løgtingsmaður, vegna løgtingsgrannskoðaranar fram soljóðandi:

Uppskot
til
samtyktar

Vísandi til niðanfyristandandi frágreiðing samtykkir Løgtingið at góðkenna roknskapin hjá **Postverkið Føroya** fyri fíggjarárið **1996.**

Frágreiðing frá løgtingsgrannskoðarunum:

1. Lógargrundarlag:
Postverk Føroya er stovnur undir Føroya landsstýri og virkar eftir:

- lóg nr. 17 frá 31. mars 1976 um Postverk Føroya, sum broytt við:
- lóg nr. 113 frá 22. desember 1989
- lóg nr. 86 frá 13. juni 1995
- lóg nr. 45 frá 9. mei 1976 um starvsfólkaviðurskiftini hjá postverkinum,

kunngerð nr. 149 frá 19. oktober 1995 um postgjøld.

2. Endamál:
Postverk Føroya hevur, sambært løgtingslóg nr. 17 frá 31. mars 1976 um Postverk Føroya, við seinni broytingum, til endamáls:

1. at lúka landsins tørv á post- og peningaflutningi innanlendis og millum Føroya og útheimin.
2. at vera tænastuveitandi stovnur, og í so stóran mun sum gjørligt rikin út frá handilsligum sjónarmiðum.
3. at laga seg eftir menning samfelagsins og átaka sær víðkað virksemi, tá ið viðurskiftini tala fyri tí,
4. at hava samvinnu á breiðum grundarlag við strandferðsluna, telefonverkið, gjaldstovuna og aðrar almennar stovnar.

3. Fíggjarviðurskifti:
Sambært løgtingslóg nr. 17 frá 31. mars 1976 um Postverk Føroya, er tað landsstýrið, sum ásetur talið á starvsfólki. Har ikki lógarreglur eru (§2, 4. stk.), verður starvsfólkið lønt og starvast eftir reglum settar av landsstýrinum.

Allar ætlanir um útbygging, umskipan og nýskipan av postverkinum, verða gjørdar av postverkinum í samráð við landsstýrið, og skulu góðkennast av landsstýrinum, áðrenn tær verða settar í verk (§3, 1. stk.).

Fíggjar, rakstrar- og íløguætlan fyri postverkið verður gjørd á hvørjum ári latin landsstýrinum (§ 5, 2. stk.).

Til tess at kunna løgtingið um ta fíggjarligu gongdina hjá postverkinum er gjørdur ein samandráttur av ársroknskapinum fyri 1996, og til samanberingar eru roknskapartølini fyri 1992-1995 tikin við.

4. Yvirlit yvir rakstur 1992-1996:

	1996	1995	1994	1993	1992 (mió.kr.)
Inntøkur					
Rakstrarinntøkur	61,0	53,7	55,5	53,5	58,1
Frímerkjadeildin, netto	9,5	6,8	6,2	7,8	6,1
Aðrar inntøku	2,4	2,6	2,1	3,0	3,4
	72,9	63,1	63,7	64,3	67,6
Útreiðslur					
Lønir, excl. Frímerkjadeildin	707	1.933	1.662	1.776	2.130
Aðrar útreiðslur	0	0	0	0	0
	16.554	17.254	17.518	18.023	19.648
Úrslit áðrenn avskrivingar	**0,8**	**-3,3**	**-0,9**	**-2,5**	**-6,5**
Avskrivingar	2,8	2,4	2,1	1,5	1,5
Eyka útreiðslur	0,0	0,0	0,0	0,3	0,3
Leiga av egnari ogn	1,9	1,7	0,0	0,0	0,0
Hall	**-0,1**	**-4,0**	**-3,0**	**-4,3**	**47**
Játtan á fíggjarlógini	0,1	1,0	3,0	4,2	8,8
Eykajáttan	0,0	3,0	0,0	0,0	0,0
Játtan íalt	**0,1**	**4,0**	**3,0**	**4,2**	**8,8**

	1996	1995	1994	1993	1992 (mió.kr.)
Samlaðar lønarútgjaldingar:					
Útgoldnar lønir, Postverkið	52,4	50,5	50,4	53,7	59,9
Útgoldnar lønir, Frímerkjad.	10,3	10,2	9,5	9,5	12,1
Útgoldnar lønir í alt	62,7	60,7	59,9	63,2	72,0

	1996	1995	1994	1993	1992 (1.000 stk.)
Gongd í postvirksemiðnum:					
Inngjaldingar og gireringar	1.241	1.190	1.234	1.269	1.485
Útgjaldingar	88	92	94	93	107
Innskrivað brøv, send	28	32	37	39	48
Pakkar sendir	75	76	73	68	86
Pakkar komnir	147	144	138	133	180
Føroysk bløð	2.355	2.290	2.265	2.290	2.758
Brævasendingar	7.200	6.788	6.791	6.771	7.047
Sendingar uttan áskrift	2.893	3.209	3.083	2.656	2.338

5. Yvirlit yvir gongd í fíggjarstøðuni 1992-1996:

(mió.kr.)

	1996	1995	1994	1993	1992
Aktiv:					
Kassa- og bankapeningur v.m.	85,2	68,2	65,8	35,5	53,0
Innistandandi á postgiro v.m.	-71,4	-65,4	-58,9	-46,4	-54,7
Tøkur peningur	13,8	2,8	7,0	-10,9	-1,7
Bygningar og grundøki	707	1.933	1.662	1.776	2.130
Onnur aktiv	0	0	0	0	0
Aktiv ialt	16.554	17.254	17.518	18.023	19.648
Passiv:					
Skuld ialt	23,6	21,2	13,0	6,2	1,9
Byggi- og rakstrargrunnur	20,4	18,9	18,9	18,1	18,2
Passiv ialt	**44,0**	**40,1**	**32,0**	**24,3**	**20,1**

6. Viðmerkingar:
Løgtingsgrannskoðararnir hava gjøgnumgingið ársroknskapin og grannskoðanarprotokollina, til tess at vissa seg um, at rætt er farið fram bókhaldsliga og roknskaparliga hjá stovninum.

1. viðgerð týsdagin 17. mars 1998. Uppskotið varð uttan nevndarviðgerð beint beinleiðis til 2. viðgerð.

Málið fall burtur sbr. stýrisskipanarlógini § 15 stk. 3, tí at løgtingsval var 30. apríl 1998, og málið ikki var liðugt viðgjørt á tingi fyri valið.

77-7 Grannskoðan av almennum roknskapum

Ár1998, hósdagin 5. mars, legði Atli Hansen, løgtingsmaður, vegna løgtingsgrannskoðararnar fram soljóðandi:

Uppskot
til
samtyktar

Vísandi til niðanfyristandandi frágreiðing samtykkir Løgtingið at góðkenna roknskapin hjá **Føroya Jarðargrunni** fyri fíggjarárið **1996.**

Frágreiðing frá løgtingsgrannskoðarunum:
1. Lógargrundarlag:
Lógargrundarlagið fyri virki grunsins er:

- Løgtingslóg nr. 59 frá 9. mei 1988 um landsjørð (sett í gildi við kunngerð nr. 43 frá 11.5.1989) við broytingum í L.l. nr. 65 frá 12.6.1990, L.l. nr. 49 frá 8.5.1991 og L.l. nr. 58 frá 26.3.1993
- Kunngerð nr. 122 frá 21. juli 1992 um festi og ásetan av festileigu og kunngerð nr. 164 frá 26. august 1993 um reglur fyri Jarðarráðið.
- Ríkislóg nr. 174 frá 25. mei 1937 »om jordbrugets fremme«, við tilhoyrandi »reglement nr. 120 for landbrugsrådet nedsat i henhold til lov nr. 174 af 24. mai 1937 om jordbrugets fremme.«

Løgtingslógin ásetur eitt kanst um fyrisitingina av landsjørðini og var ætlað sum 1. partur av tillagingini av tí gomlu lógini frá 1937. Løgtingslógin umfatar ein part av ríkislógini, nevniliga §§ 1-7 og §§ 10-27. Sostatt eru §§ 8-9 og §§ 28-61 í ríkislógini framvegis í gildi.

Samsvarað løgtingslógini er álagt landsstýrinum við kunngerð at ásetta nærri reglur fyri m.a.:
- Jarðarráðið sjálvt
- Ásetan av leigu
- Framleiðsluskyldu
- Endurgjald til fráfarandi festara fyri egnar ídøgur.

Í tí partinum av donsku lógini, sum framvegis er í gildi, eru ásettar reglur um umsiting av Jarðargrunninum, harundir keyp av jørð og lánsveiting úr grunninum og um studningsskipanir.

2. Endamál:
Føroya Jarðarráð hevur tríggjar høvuðsuppgávur:
- fyrisiting av landsjørðini
- umsiting av Jarðargrunninum
- umsiting av studningsskipanum

3. Fíggjarviðurskifti:
Fíggjarliga grundarlagið undir virki ráðsins eru

- studningur til Jarðargrunnin (ídøgu- og rentustudningur),
- ymsir studningar, ið ráðið umsitur
- søla av festijørð v.m.
- rentuinntøkur.

- - - -

Til tess at kunna løgtingið um ta fíggjarligu gongdina í Jarðargrunninum, er gjørdur eitt samandráttur av ársroknskapinum fyri 1996, og til samanberingar eru roknskapartølini fyri 1992-95 tikin við.

4. Yvirlit yvir rakstur 1992-1996:

(mió.kr.)

	1996	***1995***	***1994***	***1993***	***1992***
Rentuinntøkur v.m.	7,6	6,6	6,7	7,2	6,7
- Fyrisitingarútreiðslur	2,0	1,7	1,9	1,6	1,7
	5,6	***4,9***	***4,8***	***5,6***	***5,0***
- Avsett til tap uppá útlán	0,0	0,0	0,0	1,0	3,0
- Avsett til tap uppá útlán	0,0	0,1	0,8	4,0	0,0
Rakstrarúrslit	**5,6**	***4,8***	***4,0***	***0,6***	***2,0***

Viðmerkingar til rakstrarroknskapin
Søla av jørð og aðrar inntøkur og stuðul úr Jarðargrunninum til festarar verður ikki tikin við í rakstrarroknskapinum, men vist í notu til eina samlaða »festikonto« undir eginognini.

5. Yvirlit yvir gongd í fíggjarstøðuni 1992-1996:

Nota		1996	1995	1994	1993	(mió.kr.) 1992
	Aktiv:					
1	Útlán og eftirstøður	152	146	150	156	156
	- Avsett til tap uppá útlán	40	40	40	40	3
		112	**106**	**110**	**116**	**153**
	Innistandandi, virðisbrøv v.m.	48	50	43	44	44
	Onnur aktiv	1	1	1	1	1
	Aktiv samanlagt	**161**	**157**	**154**	**161**	**198**
	Passiv:					
	Eginpeningur: Grunnurin	78	73	67	61	95
2	Festikonto	80	81	81	81	82
	Falt	**158**	**153**	**148**	**142**	**177**
	Langfreistað skuld	0	0	3	17	23
3	Stuttfreistað skuld/studningskonti	3	4	3	2	-2
	Passiv samanlagt	**161**	**157**	**154**	**161**	**198**

Nota 1. Útlán og eftirstøður

Útlánini kunnu útgreinast til hesi endamál:

	1996	1995	1994	1993	1992
Aktiv:					
Fjós	87	87	87	87	87
Seyðahús	7	8	9	10	11
Mjólkarvirkið	20	17	17	18	13
Traktorar og maskinur	6	6	7	8	9
Selhús	5	5	5	6	5
Kommunur	5	5	3	5	7
Vakstrarhús	4	4	4	4	4
Slátrarhús	3	-	-	-	-
Rakstrarlán	2	2	1	1	2
Grísagarðurin	0	0	0	0	3
Onnur lán	1	3	3	3	6
Samanlagt	**140**	**135**	**135**	**142**	**147**
Falnir avdráttir og rentur	12	11	15	14	9
	152	**146**	**150**	**156**	**156**
- Avsett til tap	40	40	40	40	3
	112	**106**	**110**	**116**	**153**

Viðvíkjandi avsetingum ímóti tapum, sum í 1993 vórðu førdar yvir eginognina, varð upplýst, at talan ikki var um eina avseting ímóti tapum uppá «styttri sikt», men um eina serliga avseting ímóti framtíðar tapum, sum ikki kunnu útgreinast á ávísar skuldarar og ikki kunnu gerast upp. Síðani er á hvørjum ári upplýst, at ein engagementsgjøgnumgongd verður gjørd, soleiðis at metast og avsetast kann uppá tey einstøku tilgóðahavandini í komandi ársroknskapi.

Í grannskoðanarprotokollini fyri 1996 verður upplýst, at hetta er eitt umfatandi arbeiði, sum er byrjað, og sum væntandi verður liðugt á heysti 1997. Grannskoðanin roetir, at tað er av stórum týdningi, at álitaldandi

verður arbeitt við at fáa nevndu engagementsgjøgnumgongd fidna, soleiðis at eitt neyvari grundarlag fyri uppgerð av avsetingartørvinum verður tøkt.

Jarðarráðið hevur í hesum sambandi áður upplýst, at tey serstøku ognarvirðurskiftini á festijørðini, sum nógv tann størsti parturin av fíggjing er latin til, gera, at grunnurin í veruleikanum »lacnir« til sín sjálvs. Tað er tí ongin veðrættur at gera galdandi. Útlegg kann ikki gerast, og innheintingarmál kunnu ikki førast so langt, at ein møguligt tvingsilssøla kann koma uppá á tal. Jarðargrunnurin hevur ikki heimild at avskriva skuld, og samanumtikið kann grunnurin tí ógvuliga sjáldan veruliga staðfesta tap.

Nota 2. Festikonto

					(mió.kr.)
	1996	*1995*	*1994*	*1993*	*1992*
Saldo, primo	*81*	*81*	*81*	*82*	*76*
Søla av jørð v.m.	1	*2*	*3*	*2*	*9*
- Útgoldið til festarar, netto	2	*2*	*2*	*3*	*3*
Saldo ultimo	**80**	*81*	*81*	*81*	*82*

Niðanfyristandandi er gjørdur ein samandráttur av inntøkum og útgjaldingum á festikonto árini 1992-1996. Í serligari notu í rokuskapinum eru inntøkurnar sundurgreinaðar.

Viðmerkingar til festikonto

Sambært § 5 í kunngerð nr. 164 frá 26. august 1993 um reglur fyri Jarðarráðið verður peningurin fyri søla av jørð v.m. goldin í Jarðargrunnin og har bókaður á konto fyri hvørt festi sær. Jarðarráðið kann veita fíggjarligan stuðul til fløgur á festinum við peningi av festikonto, og umsóknir um fíggjarligan stuðul av festikonto verða viðgjørdar av ráðnum eftir somu reglum sum umsóknir um lán.

Sostatt hevur hvørt festi sína festikonto, og Jarðarráðið upplýsir, at hetta er orsøkin til, at inntøkur og útreiðslur viðvíkjandi hesum konti ikki eru tiknar við í rakstrarroknskapi Jarðargrunsins.

Nota 3. Studningskonti

Ultimo 1995 var samlaða saldoin á studningskonti í roknskapinum hjá Føroya Jarðargrunni kr. 3.493.105, svarandi til uppsamlað avlop av studningsjáttanum frá undanfarnum árum. Á fíggjarlógini fyri 1996 vórðu játtaðar 15 mió.kr. til landbúnaðarstudningar.

Við eykajáttanarlóg oktober 1996, sum varð samtykt av løgtinginum í desember 1996, varð staðfest, at umrødda saldo á studningskonti ultimo 1996 uppá t.kr. 3.493 skuldi falla aftur til landskassan í 1996, tó soleiðis, at av hesum skuldi játtast 1,2 mió.kr. til sláturvirkið hjá MBM, og 0,5 mió.kr. til serkøna hjálp. Restupphæddin t.kr. 1.793, sum grunnurin skyldaði, skuldi mótroknast í játtaðu studningsupphæddina uppá 15 mió.kr., og upphæddin, sum Gjaldstovan skuldi flyta grunninum, varð tí minkað tilsvarandi til t.kr. 13.207.

Samanumtikið var játtanin á fíggjarlógini fyri 1996 hendan:

Til landbúnaðarstudningar, íroknað umsitingarútreiðslur	15,0 mió.kr.
Til sláturvirkið hjá MBM	1,2 mió.kr.
Til serkøna hjálp til landbúnaðarnevndina,	
ið skal gera álit um framtíðar landbúnaðarvinnu	0,5 mió.kr.
Í alt	16,7 mió.kr.

Sambært roknskapinum hjá Jarðargrunninum fyri 1996 hevur grunnurin havt hesar studningsútreiðslur vegna landskassan:

	Nýtsla	Játtan	Minninýtsla
			(mió.kr.)
Landbúnaðarstudningar	14,2	15,0	0,8
Serkøn hjálp	0,3	0,5	0,2
Sláturvirki	1,2	1,2	0
Ialt	15,7	16,7	1,0

Vísandi til omanfyristandandi er sostatt talan um eina samlaða minninýtslu uppá umt. 1 mió.kr., sum fellur aftur til landskassan í 1996, men samlaða saldoin á studningskonti í roknskapinum hjá Jarðargrunninum fyri 1996 er umt. 2,7 mió.kr. Sostatt er talan um ein mun uppá umt. 1,7 mió.kr. Hesin munur kann útgreinast soleiðis:

	(mió.kr.)
Studningur til sláturvirkið hjá MBM, ikki við í roknskapinum fyri 1996	1,2
Avloysarastudningur, ikki við í roknskapinum fyri 1996	0,5
	1,7

Hesi viðurskifti verða javnað í roknskapinum fyri 1997.

6. Roknskapargrannskoðanin:
Løgtingsgrannskoðararnir hava gjøgnumgingið ársroknskapirnar og grannskoðanarprotokollirnar til tess at vissa seg um, at rætt er farið fram bókhaldsliga og roknskapsliga.

7. Viðmerkingar:
Løgtingsgrannskoðararnir hava áður vist á, at neyðugt er at gera lógargrundarheiðið viðvíkjandi landsjørðini liðugt, soleiðis at restin av ríkislógini og reglugerðini frá 1937 verður tillagað nútíðar viðurskiftum, m.a. vísandi til, at talan er um fleiri lógarásettar reglur viðvíkjandi fíggjarviðurskiftum, sum eru ótíðarhóskandi, og sum ikki verða fylgdar.

Í 1993 setti landsstýrið eina nevnd at gera álit um framtíðar landbúnaðarvinnu. Álitið er um at vera liðugt, og løgtingsgrannskoðarunum kunnugt, hvør nevndin gjørt uppskot um nýggja lóggávu á økinum.

1. viðgerð tósdagin 17. mars 1998. Uppskotið varð uttan nevndarviðgerð beint beinleiðis til 2. viðgerð.

Málið fall burtur sbr. stýrisskipanarlógini § 15 stk. 3, tí at løgtingsval var 30. apríl 1998, og málið ikki var liðugt viðgjørt á tingi fyri valið.

77-8 Grannskoðan av almennum roknskapum

Árið 1998, hósdagin 5. mars, legði Atli Hansen, løgtingsmaður, vegna løgtingsgrannskoðararnar fram soljóðandi:

Uppskot
til
samtyktar

Vísandi til niðanfyristandandi frágreiðing samtykkir Løgtingið at góðkenna roknskapirnar hjá **Vakstrarhúsgrunninum** fyri fíggjarárið **1996.**

Frágreiðing frá løgtingsgrannskoðarunum:

1. Endamál:

Vakstrarhúsgrunnurin er ikki stovnssettur við lóg, men landsstýrið gjørdi í november 1985 eina interna reglugerð fyri grunnin. Grunnurin verður fyrisitin av Føroya Jarðarráð, og hevur til endamáls at veita lán og studning til vakstrarhús og grønmetisframleiðslu.

Til tess at kunna løgtingið um ta fíggjarligu gongdina, er gjørdur ein samandráttur av ársroknskapinum fyri 1996 og til samanberingar, eru roknskapartølini fyri 1992-1995 likin við.

2. Yvirlit yvir rakstur 1992-1996:

	1996	1995	1994	1993	(1.000 kr.) 1992
Studningur v.m.	0	0	0	0	400
Sakargjald	0	0	0	1	0
Rentur av útlánum	33	50	86	231	151
Rentur av peningi v.m.	186	205	3	49	68
Inntøkur alt	**219**	**255**	**89**	**281**	**619**
Útgoldin studningur	25	43	0	0	0
Umsiting	20	20	20	20	40
Avskrivingar av lánum	0	0	0	209	3.000
Ársúrslit	**174**	**192**	**69**	**52**	**-2.401**

3. Yvirlit yvir gongd í fíggjarstøðuni 1992-1996:

	1996	1995	1994	1993	(1.000 kr.) 1992
Ogn:					
Útlán og eftirstøður	1.223	1.201	1.228	1.277	1.164
Tøkur peningur	4.035	3.883	3.679	3.561	3.685
Ogn í alt	**5.258**	**5.083**	**4.907**	**4.838**	**4.849**
Eginpeningur og skuld:					
Eginpeningur	5.258	5.083	4.906	4.837	4.786
Millumrokning Jarðargrunnin	0	0	0	0	63
Eginpeningur og skuld í alt	**5.258**	**5.083**	**4.906**	**4.837**	**4.849**

4. Roknskapargrannskoðanin:
Í átekningini verður fyrivarni tikið fyri, at onki er avsett at standa ímóti tapi uppá útlán.

5. Viðmerkingar:
Í seinastu frágreiðing frá løgtingsgrannskoðarunum dagfest 12. februar 1997, tá roknskapurin fyri 1995 varð lagdur fyri tingið til samtyktar, varð víst á, at einasta grundarlag fyri virksemi grunsins var ein heldur ófullfíggjað intern reglugerð frá landsstýrinum, og at grunnurin hvørki hevði fógur- ella fíggjarheimild. Um landsstýrið ætlaði at varðveita grunnin varð tí mælt landsstýrinum til at leggja fógaruppskot fyri tingið um hetta.

Vísandi til løgtingslóg nr. 134 frá 20. august 1997 um »Grunn fyri Vakstrarhús og Grønmetisframleiðslu« varð Vakstrarhúsgrunnurin avtikin, og ogn grunsins varð flutt grunninum fyri Vakstrarhús og Grønmetisframleiðslu sum stovnsfæ. Í kunngerð nr. 140 frá 19. september 1997 um »Grunn fyri Vakstrarhús og Grønmetisframleiðslu« ásetti landsstýrismaðurin nærri reglur um umsiting og lán og stuðul úr grunninum.

1. viðgerð týsdagin 17. mars 1998. Uppskotið varð uttan nevndarviðgerð beint beinleiðis til 2. viðgerð.

Málið fall burtur sbr. stýrisskipanarlógini § 15 stk. 3, tí at løgtingsvalið var 30. apríl 1998, og málið ikki var liðugt viðgjørt á tingi fyri valið.

77-9 Grannskoðan av almennum roknskapum

Ár 1998, hósdagin 5. mars, legði Atli Hansen, løgtingsmaður, vegna løgtingsgrannskoðaranar fram soljóðandi:

Uppskot
til
samtyktar

Vísandi til niðanfyristandandi frágreiðing samtykkir Løgtingið at góðkenna roknskapirnar hjá **Strandferðsluni** fyri fíggjarárini **1995 og 1996.**

Frágreiðing frá løgtingsgrannskoðarunum:

1. <u>Endamál:</u>
Reglugerð fyri Strandferðsluna varð samtykt á landsstýrisfundi 14. november 1992, samstundis sum reglugerðin, lýst við kunngerð nr. 81 frá 22. august 1984, varð avtikin. Sambært §§ 1 og 2 í reglugerðini er Strandferðslan ein landsfyritøka undir Føroya Landsstýri, sum hevur tilf endamáls:

1. at vera tænastuveitandi fyritøka, við tí fyri eyga at lúka landsins tørv á innlendis fólka- og farmaflutningi,

2. í so stóran mun sum gjørligt, at verða rikin út frá handilsligum sjónarmiðum.

Sambært § 5 kann virksemið, ella partar av hesum, verða skipað í partafeløg, og verður stjórin tá stjórn ella formaður í hesum partafeløgum. Stjórin leggur uppskot um stovnan av slíkum feløgum fyri landsstýrið.

2. <u>Fíggjarviðurskifti:</u>
Sambært § 4, 2. stk., í reglugerðini verður takstpolitikkur, útbyggingar-, fíggjar-, rakstrar-, ferða- og íløguætlan skipað í 4 ára ætlanum, sum á hvørjum ári verða endurskoðaðar og lagdar fyri landsstýrið til góðkenningar í seinasta lagi 1. apríl.

Sambært § 3 í reglugerðini setir landsstýrið stjóran, og eftir tilmæli frá stjóranum, aðrar leiðarar á 1. stigi. Stjórin setir annað starvsfólk sambært galdandi reglum.

- - - - -

22. januar 1997 hevur landsstýrismaðurin undirskrivað eina nýggja reglugerð fyri Strandfaraskip Landsins við gildi frá 1. januar 1997. Sambært hesi reglugerð verður virksemið víðkað til eisini at kunna fevna um uttanlands fólka- og farmaflutning, og stjórin fær heimild at seta øll starvsfólk.

- - - - -

Til tess at kunna løgtingið um ta fíggjarligu gongdina hjá Strandferðsluni er gjørdur ein samandráttur av ársroknskapinum fyri 1996. Til samanberingar eru roknskapartølini fyri 1993-1995 tikin við.

3. Yvirlit yvir rakstur 1993-1996:

(mió. kr.)

	1996	1995	1994	1993	1992
Inntøkur:					
Farmagjald	0	0	0	0	400
Persónsflutningur	0	0	0	1	0
Eykatúrar (incl. tyrlur)	33	50	86	231	151
Kiosk & Kafeteria	186	205	3	49	68
Bygdaleiðir	25	43	0	0	0
Aðrar inntøkur	20	20	20	20	40
Inntøkur samanlagt	**174**	**192**	**69**	**52**	**-2.401**
Studningur v.m.	0	0	0	0	400
Sakargjald	0	0	0	1	0
Rentur av útlánum	33	50	86	231	151
Rentur av peningi v.m.	186	205	3	49	68
Inntøkur ialt	**219**	**255**	**89**	**281**	**619**
Útgoldin studningur	25	43	0	0	0
Umsiting	20	20	20	20	40
Avskrivingar av lánum	0	0	0	209	3.000
Ársúrslit	**174**	**192**	**69**	**52**	**-2.401**

Roknskapurin hjá Strandferðsluni fevnir eisini um tyrluflúgvingina fram til 1. apríl 1994, tá P/F Atlantic Airways yvirtók raksturin.

4. Yvirlit yvir gongd í fíggjarstøðuni 1993-1996:

(t. kr.)

	1996	1995	1994	1993
Arkiv:				
Kassi, bank & Giro	2	3	3	2
Skuldarar	13	9	8	5
Eykajáttan	27	4	21	7
Goymsla	-	1	1	0
Bygningar, bilar v.m.	0	7	4	2
Aktiv samanlagt	**42**	**23**	**36**	**18**
Passiv:				
Kassakredittur	27	8	15	8
Ognarar	20	20	21	20
Millumrokning við landskassan	-5	5	0	-10
Passiv samanlagt	**42**	**23**	**36**	**18**

5. Serroknskapir fyri skip, bilar og tyrlur:
Umframt ársroknskap fyri samlaða virksemið hjá Strandferðsluni, ger Strandferðslan á hvørjum ári serroknskapir fyri hvørt skip sær, men fyri bilarnar og tyrlurnar undir einum.

Í serroknskapunum eru inntøkurnar og raksturarútreiðslurnar útgreinaðar á tær ymsu flutningseindirnar. Niðanfyristandandi er gjørdur ein samandráttur av serroknskapunum fyri árini 1994-1996:

(mió. kr.)

	1996			1995			1994		
	Inn-tøkur	Rakst.-útreiðs.	Úr slit	Inn-tøkur	Rakst.-útreiðs.	Úr slit	Inn-tøkur	Rakst.-útreiðs.	Úr slit
Syril	20,3	27,3	-7,0	19,3	24,9	-5,6	18,2	23,8	-5,6
Teistin	10,7	19,1	-8,5	12,5	22,9	-10,4	12,0	18,4	-6,4
Sam	5,6	3,2	2,5	7,3	4,6	2,7	6,8	4,3	2,5
Ternan I	0,6	2,5	-1,6	0,6	3,6	-3,0	0,8	2,4	-1,6
Ternan	10,3	7,1	3,2	9,5	6,9	2,6	10,0	6,3	3,7
Dúgvan	7,0	7,0	0,0	3,1	3,6	-0,4	5,1	6,1	-1,0
Tróndur	3,8	5,8	-1,9	3,7	5,0	-1,3	2,7	5,8	-3,1
Ritan	0,9	1,9	-1,1	1,0	1,7	-0,7	1,0	1,5	-0,5
Másin	0,4	1,4	-1,0	0,4	1,1	-0,7	0,4	1,1	-0,7
Pride	0,0	0,9	-0,8	0,2	1,1	-0,7	0,4	1,1	-0,7
Súlan	0,2	0,5	-0,3	0,2	0,5	0,3	0,2	0,4	-0,2
Barskor	0,5	1,1	-0,5	0,5	1,1	-0,6	0,6	1,0	-0,4
Sildberin	0,1	1,3	-1,2	0,2	0,9	-0,7	0,1	0,9	-0,8
Clare	1,6	3,3	-1,7	=	=	=	=	=	=
Skip alt	62,1	82,3	-20,2	58,5	77,8	-19,2	58,0	72,9	-14,9
Bilarnir	8,1	8,9	-0,8	7,1	6,9	0,3	6,6	4,7	1,9
Tyrlur	=	=	=	0,0	0,0	0,0	0,5	1,1	-0,6
Alt	70,2	91,2	-21,0	65,7	84,7	-19,0	65,1	78,7	-13,6
Aðrar útreiðslur			32,7			27,0			26,0
Úrslit			-53,7			-46,0			-39,6
Úrslit Bygdaleiðir			-7,0			-8,5			-10,0
Samlað úrslit			-60,7			-54,5			-49,6

6. Seinasta frágreiðing løgtingsgrannskoðaranna:

Í seinasta frágreiðing løgtingsgrannskoðaranna, dagfest 18. januar 1996 í uppskoti til samtyktar viðvíkjandi roknskapunum fyri árini 1993 og 1994 (løgtingsmál nr. 4/9 1995), tóku løgtingsgrannskoðararnir samanum tær mongu viðmerkingarnar frá roknskapargrannskoðanini og átalaðu m.a., at roknskaparumsitingin ikki var nóg góð, og at ávís viðurskifti ikki vóru í samsvari við reglugerð landsstýrisins.

Løgtingsgrannskoðararnir hava síðani fleiri ferðir, higartil uttan úrslit, biðið landsstýrismannin um viðmerkingar til hesi viðurskifti.

7. Roknskapargrannskoðanin:

Løgtingsgrannskoðararnir hava gjøgnumgingið ársroknskapirnar og grannskoðanarprotokollirnar til tess at vissa seg um, at rætt er farið fram bókhaldsliga og roknskaparliga hjá stovnunum.

Eins og í grannskoðanarfrágreiðingum undanfarin ár, verður viðvíkjandi 1995 og 1996 aftur gjørt vart við fleiri átaluverd viðurskifti. Víst verður á, at bøtt er um nøkur viðurskifti, men fleiri viðmerkingar eru óbroyttar og nakrar komnar aftrat. Roknskapargrannskoðanin vísir m.a. á:

- At nøkur av starvsfólkunum fáa ein ávísa upphædd aftrat í vanligu lønini, og at ongin heimild er til slíkar viðbøtur. Gjørt verður eisini vart við, at nýggi strandferðslustjórin ikki hevur fingið nakað endaligt setanarbræv.
- At upphæddin, sum er bundin í skuldarar, er alt ov stór í mun til fraktinntøkur og gjaldstreytir, og at onki samsvar er ímillum vøkstur í skuldarum og farmagjaldi.

- At starvsfólk hava fingið forskot og lænt pening úr kassanum, hóast grannskoðanin fleiri ferðir hevur heitt á leiðsluna um at bera so í bundi, at hetta ikki kemur fyri.
- At ferðaseðlar á Smyrli ikki vóru í nummarrað, hóast fleiri áheitanir um hetta, og tí er ikki møguligt at fáa trygd fyri, at allir seldir ferðaseðlar verða skrásettir sum inntøka.
- At bókhaldið hevur virkað sera illa. Víst verður á, at við einum bókhaldi, sum ongantíð er ajour, manglandi avstemmingum og óneyðugum feilbókingum, hevur stovnurin stórt sæð onga fíggjarstýring havt í 1996. Mett verður, at við einum peningastreymi uppá uml. 150 mió.kr. er talan um vantandi ábyrgdarkenslu mótvegis ulmennum peningi.
- At dagligu arbeiðsgongdirnar og rutinurnar millum tær ymsu deildirnar og bókhaldið eru ov leysar og ógreiðar, og at tørvur er á einum betri arbeiðs- og ábyrgdarbýti á stovninum.

- - - - -

Roknskapargrannskoðanin vísir eisini á, at nýggja leiðslan er byrjað at umstrukturera stovnin. Mett verður, at um hesin málsetningur verður rokkin, skuldi stovnurin framyvir sloppið undan tilvildarligum skráseting-um, eins og tað hevði økt um tann fíggjarliga tryggleikan.

8. Viðmerkingar:
Løgtingsgrannskoðararnir átala, at landsstýrismaðurin ikki vil svara skrivum frá løgtingsgrannskoðarunum viðvíkjandi viðmerkingum í seinasta uppskoti til samtyktar viðvíkjandi roknskapunum fyri 1993 og 1994.

Vísandi til viðmerkingarnar frá roknskapargrannskoðanini átala løgtingsgrannskoðararnir, at roknskaparviðurskiftini í 1995 og 1996 á fleiri økjum ikki hava verið í einari tryggari legu.

Løgtingsgrannskoðararnir átala, at Strandferðslan aftur í 1995 og 1996 hevur brúkt nógv meira enn játtað á fíggjarlóg og eykajáttanarlóg, og at landsstýrismaðurin ikki hevur svarað fyrispurningum um útgreining av fortreytum fyri játtanunum á fíggjarlógini fyri 1995 og 1996.

1. viðgerð týsdagin 17. mars 1998. Uppskotið varð uttan nevndarviðgerð beint beinleiðis til 2. viðgerð.

Málið fall burtur sbr. stýrisskipanarlógini § 15 stk. 3, tí at løgtingsval var 30. apríl 1998, og málið ikki var liðugt viðgjørt í tingi fyri valið.

77-10 Grannskoðan av almennum roknskapum

Árið 1998, hósdagin 5. mars, legði Atli Hansen, løgtingsmaður, vegna løgtingsgrannskoðararnar fram soljóðandi:

Uppskot
til
samtyktar

Vísandi til niðanfyristandandi frágreiðing samtykkir Løgtingið at góðkenna roknskapirnar hjá **Telefonverki Føroya Løgtings** fyri fíggjarárini **1993-96.**

Frágreiðing frá løgtingsgrannskoðarunum:

1. Lógargrundarlag:
Telefonverk Føroya Løgtings er stovnur undir Føroya Landsstýri og virkar eftir:
- lóg nr. 111 frá 30. mei 1927 um »Lov om telefoner paa Færøerne«,
- løgtingslóg nr. 73 frá 24. september 1970 um »broyting í lóg um telefonir í Føroyum«
- løgtingslóg nr. 28 frá 22. mei 1969 um »áseting av telefongjøldum«
- kunngerð nr. 10 frá 18. februar 1987 »Reglugerð fyri Telefonverk Føroya Løgtings«, og
- kunngerð nr. 19 frá 22. januar 1993 um »telefongjøld v.m.«.

2. Endamál:

Sambært reglugerðini er Telefonverk Føroya Løgtings stovnur undir Føroya landsstýri, sum hevur til endamáls:

1. at lúka landsins tørv á telefonsambandinum innanlendis og millum Føroyar og útheimin,
2. at vera tænastuveitandi stovnur og í so stóran mun sum gjørligt rikin út frá handilsligum sjónarmiðum,
3. at laga seg eftir menning samfelagsins og álaka sær virksemi, tá ið viðurskiftini tala fyri tí, at hava samvinnu á breiðum grundarlagi við postverkið, gjaldstovuna og aðrar almennar stovnar.

3. Fíggjarviðurskifti:

Sambært reglugerðini skal landsstýrið seta ein fíggjarstjóra, sum undir telefonverksstjóranum hevur ábyrgdina av fíggjardeild og fyrisiting telefonverksins.

Somuleiðis skal setast ein tekniskur stjóri, sum undir telefonverksstjóranum hevur ábyrgdina av teknisku útbygging og tekniska rakstri telefonverksins.

Landsstýrið ásetir talið á starvsfólki, og skal í samráð við telefonverksstjóran seta reglur fyri fíggjardeild telefonverksins.

Útbyggingar-, fíggjar-, rakstrar- og fløguætlan fyri telefonverkið skal á hvørjum ári latast landsstýrinum til góðkenningar í seinasta lagi 1. juli.

Til tess at ráðgeva landsstýrinum um útbyggingaræltanir, skal skipast ein teknisk nevnd við trimum limum, valdum av landsstýrinum.

Til tess at kunna løgtingið um tu fíggjarligu gongdina hjá telefonverkinum, er gjørdur ein samandráttur av ársroknskapunum fyri tíðarskeiðið 1993-1996.

4. Yvirlit yvir rakstur 1993-1996:

(mió. kr.)

	1996	1995	1994	1993
Telefonfelagagjøld	23	23	24	24
Samtaluinntøkur	95	74	74	72
Annað	42	57	53	32
Inntøkur alt	161	154	151	128
Kostnaður alt	93	87	85	55
Rakstrarúrslit	67	67	66	72
Avskrivingar	38	32	35	36
Rentur v.m. netto	-11	-13	-16	-24
Úrslit áðrenn óvanligar upphæddir	18	21	15	12
Óvanligar inntøkur/útreiðslur netto	0	0	-5	-2
Úrslit	**18**	**21**	**10**	**10**
Útgoldnar lønir	**174**	**192**	**69**	**52**

5. *Yvirlit yvir gongd í fíggjarstøðuni 1993-1996:*

(mió. kr.)

	1996	1995	1994	1993
AKTIV:				
Íløgur	171	198	211	338
Partabrøv í atknýttum virki	0	0	0	2
Tøkur og bundin peningur	25	9	5	15
Onnur virði í umferð	41	43	45	34
Aktiv samanlagt	**238**	**249**	**262**	**389**
PASSIV:				
Eginogn	71	53	31	125
Langfreistað skuld	88	131	158	189
Stuttfreistað skuld	79	66	72	75
Skuld samanlagt	167	197	230	264
Passiv samanlagt	**238**	**249**	**262**	**389**

6. *Roknskapargrannskoðanin:*

Løgtingsgrannskoðararnir hava gjøgnumgingið ársroknskapirnar og grannskoðanarprotokollirnar til tess at vissa seg um, at rætt er farið fram bókhaldsliga og roknskaparliga hjá stovninum.

Roknskapargrannskoðanin hevur seinasta árini gjøgnumgingið týðandi mannagongdir á roknskaparøkinum og mælt til broytingar og íbøtur, sum síðani eru framdar. Víst er á, at tørvur er á eini bókingarvegleiðing, og at arbeitt hevur verið við at gera ein bókling við skrivligum vegleiðingum fyri innanhýsis mannagongdum, men hetta arbeiði er ikki liðugt.

Øll árini hevur roknskapargrannskoðanin gjørt vart við, at ongar reglur eru ásettar fyri fíggjardeild telefonverksins. Sambært § 3 í reglugerðini fyri telefonverkið skal landsstýrið ásetta hesar reglur í samráð við telefonverksstjóran.

Eisini er víst á, at landsstýrið ikki hevur skipað ta í § 5 umrøddu teknisku nevnd, sum skal ráðgeva landsstýrinum viðvíkjandi útbyggingarætlanum.

Roknskapargrannskoðanin vísir á, at virðisásetingin av íløgum hevur stóran týdning fyri, hvussu nógv samlaðu materiellu ognirnar standa bókaðar til, og tískil eisini eginpeningurin. Sum er, verða allar íløgur í materiella støðisogn ognarførdar í fíggjarstøðuni til kostpris, og mælt verður til, at ein skrivlig mannagongd verður gjørd fyri ognarføring av íløgum, so at allar íløgur verða mettar í mun til nyttuvirðið og samanbornar við kostnaðarætlan/íknandi íløgur ella keyp uttanífrá á ein skipaðan hátt.

Telefonverkið keypti í 1990 partabrøvini í felagnum, sum átti bygningin, sum Telefonverkið heldur til í í Hálsi, fyri 5 mió.kr. Í 1992 vórðu partabrøvini niðurskrivað við uml. 3 mió.kr. til uml. 2 mió.kr., sum svaraði til eginognina í felagnum tá. Í 1994 vórðu partabrøvini niðurskrivað til 0.

Grannskoðanin vísir í hesum sambandi á, at sambært ársroknskapinum hjá felagnum fyri 1994 er eginognin negativ við uml. 2 mió.kr. Orsøkin er, at bygningurin í roknskapinum hjá felagnum er niðurskrivaður við uml. 4,3 mió.kr. til 13 mió.kr. Upplýst verður eisini, at telefonverkið í 1994 harumframt hevur avskrivað uml. 2,5 mió.kr. falt viðvíkjandi áogn hjá felagnum. Upplýst verður, at arbeitt hevur verið í fleiri ár við eitl-

annum um at avtaka felagið og lata telefonverkið yvirtaka bygningin. Ætlanin var at fáa hetta við í ársroknskapin fyri 1996, men leiðslan avgjørdi at útseta málið til 1997.

7. Viðmerkingar:
Sambært ársroknskapunum hevur telefonverkið í nógv ár upplýst, at løgur verða avskrivaðar »liniert yvir ta fíggjarligu livitíðina«. Men í 1994 varð materiella støðisognin niðurskrivað við umk. 100 mió.kr. Orsøkin er, at kaðalar, radiostøðir og sentralar v.m. hava eina munandi styttri livitíð, enn áður upplýst í tokuskapinum. Henda niðurskriving er ikki vist í rakstrarroknskapinum, men er ført beinleiðis yvir eginognina. Løgtingsgrannskoðararnir hava í hesum sambandi hefti seg við, at telefonverkið í mong ár ikki hevur nýtt rættar livitíðir.

Í sambandi við viðgerðina av roknskapunum hjá Telefonverkinum, hava løgtingsgrannskoðararnir sent landsstýrinum ymsar fyrispurningar, m.a. viðvíkjandi § 3 og § 5 í reglugerðini og viðvíkjandi tilknýti telefonverksins til fíggjarlógina. Løgtingsgrannskoðararnir átala, at landsstýrismaðurin ikki svarar fyrispurningum, hóast fleiri áminningar.

1. viðgerð týsdagin 17. mars 1998. Uppskotið varð uttan nevndarviðgerð beint beinleiðis til 2. viðgerð.

Málið fall burtur sbr. stýrisskipanarlógini § 15 stk. 3, tí at løgtingsval var 30. apríl 1998, og málið ikki var liðugt viðgjørt á tingi fyri valið.

77-11 Grannskoðan av almennum roknskapum

Ár 1998, hósdagin 5. mars, legði Atli Hansen, løgtingsmaður, vegna løgtingsgrannskoðararnar fram soljóðandi:

Uppskot
til
samtyktar

Vísandi til niðanfyristandandi frágreiðing samtykkir Løgtingið at góðkenna **landsroknskapirnar** fyri fíggjarárini **1992-1994.**

Frágreiðing frá løgtingsgrannskoðarunum:

1. Lógargrundarlag, roknskapar- og fíggjarviðurskifti:
Sambært lóg nr. 16 frá 26. aprfl 1965 um grannskoðan av landsins almennu roknskapum við síunt broyting, skulu løgtingsgrannskoðararnir leggja landskassans roknskap fyri løgtingið til samtyktar.

Landskassans roknskapir við viðmerkingum skulu sendast løgtingsgrannskoðarunum innan 8 mánaðir eftir at fíggjarárið er úti. Landsroknskapirnir seinnu árini hava verið nakað seinkaðir í mun til hesa tíðarfreist.

Somuleiðis mega løgtingsgrannskoðararnir ásanna, at teir hava verið ov seinir at leggja landsroknskapirnar fyri tingið. Ein orsøk er, at í hesum valskeiði gekk nærum 1 ár, áðrenn løgtingið valdi løgtingsgrannskoðarar. Av tí at val varð útskrivað í ótíð í 1994, fall uppskot til samtyktar um góðkenning av landsroknskapunum fyri árini 1989-1991 burtur, og løgtingsgrannskoðararnir máttu tí sum tað fyrsta leggja hesar roknskapir aftur fyri tingið. Løgtingsgrannskoðararnir hava sostatt, síðani teir vórðu valdir í mei 1995, lagt 6 landsroknskapir fyri tingið. Løgtingsgrannskoðararnir hava ikki fingið teir endaligu landsroknskapirnar við viðmerkingum fyri 1995 og 1996 enn. Flest allir aðrir almennir roknskapir eru lagdir fyri tingið fram til og við 1996.

Fyri fíggjarárini 1992 1994 hava hesar ásetingar í Ll. nr. 1 frá 13. mei 1948 um stýrisskipan Føroya í sermálum verið galdandi viðvíkjandi inntøkum, útreiðslum og lántøku:

§ 19: »Ongin skattur má verða álagdur, broyttur ella avtikin uttan við løgtingslóg. Lán, ið skuldbindur Løgtingið, má ikki verða tikið, og má heldur ikki søla ella onnur latan av hendi av fastognum landsins ella nýtslurætti teirra fara fram uttan samsvarandi løgtingslóg.«

§ 21: »Áðrenn fíggjarlóg ella bráðfeingis fíggjarlóg er samtykt á Løgtingi, má skattur ikki verða kravdur. Ongin útreiðsla má verða goldin, ið ikki er heimlað í fíggjarlóg, galdandi, tá ið útreiðslan verður ávist, ella í aðrari galdandi heimildarlóg. Tær játtanir, ið eru ásettar í fíggjarlóg ella aðruri heimildarlóg, mega bert verða goldnar í tí fíggjarári, sum fíggjarlógin er galdandi. Tó kann landsstýrið í tíðarskeiði inntil 3 mánaðir, aftan á fíggjarárið er endað, ávísa pening, ið er játtaður á fíggjarlóginni fyri árið, ið fór.«

Nevnast kann, at fíggjarnevndin í álitinum til fíggjarlógina fyri 1991 vísti til ásettu reglurnar fyri fíggjarárið 1990 og boðaði frá, at fyri játtanirnar til umsitingarrakstrarstøð vóru hesar høvuðsreglur:

»Fyri játtanirnar til umsitingarrakstrarstøð eru eins og fyri fíggjarárið 1990 hesar høvuðsreglur:

1. *Játtanin er ein blokkur til rakstrarstaðið.*
2. *Játtaðar ósettar normeringar kunnu ikki setast uttan við loyvi frá landsstýrinum, og treytað av at stovnurin kann halda seg innanfyri samlaðu játtanina til stovnin.*
3. *Ongin nýnormering verður játtað uttan loyvi frá fíggjarnevnd løgtingsins.*
4. *Tað er ábyrgd stovnsleiðaranna at syrgja fyri, at givnar játtanir verða hildnar. Um - sum undantøk vegna t.d. broyttar fortreytir - ein játtan ikki kemur at halda, er tað skylda stovnsleiðaranna at siga landsstýrinum frá hesum. Landsstýrið vil so saman við fíggjarnevndini taka neyðug stig.*
5. *Broyting av leigumálum og EDV skipanunum, leasing v.m. kann bert fremjast innan galdandi játtan og við loyvi frá landsstýrinum.«*

Í Ll. nr. 2 frá 13. mei 1948 um umboðsvald Føroya er í § 9 ásett, at:

»hvør landsstýrismaður hevur yvir fyri Løgtinginum ábyrgd av at røkja tað umboðsvald og tey umsitan, sum teimum er latin upp í hendur beint og forsvarliga.

Umboðanina av teimum økjum, ið eru undir landsstýrisins ræði, býta landsstýrismenn sín ámillum.

Løgmaður ávísir allar útreiðslur úr kassa landsins og ansar, at hesar útreiðslur eru ikki størri enn tær játtanir, sum tingið hevur samtykt.«

Við heimild í hesi lóg vórðu reglur viðvíkjandi ávísing av útreiðslum úr landskassanum ásettar í reglugerð landsstýrisins frá 12. januar 1990.

Tað var ikki í lóggávu ella á annan hátt nærri ásett, hvussu landsroknskapurin skuldi setast upp, hvørjir stovnar skulu takast við, og hvørjar upplýsingar skulu vera við, eins og tað heldur ikki vóru ásett beinleiðis krøv um reglugerðir og fyriskipanir fyri almennar stovnar, harundir lýsing av uppgávum, endamáli og skrásetingum hesum viðvíkjandi.

Sambært § 12 í Ll. nr. 2 er tað skylda landsstýrisins:

»at ansa, at ongar útreiðslur verða goldnar, sum ikki hava heimild í fíggjarlóg, ið er galdandi, tá ávísan fer fram, ella í aðrari galdandi heimildarlóg. Tær játtanir, sum eru ásettar við fíggjarlóg ella aðruri heimildarlóg, kunnu bert verða goldnar í tí fíggjarári, tá fíggjarlógin er galdandi, eins og yvirførtan frá einum posti til annan ikki kann fara fram uttan greiniliga heimild til hetta í lógini. Landsstýrið hevur tó

heimild til í einum tíðarskeiði av inntil 3 mánaðir, aftan á at fíggjarárið er lokið, at ávísa peningi, sum er játtaður í fíggjarlógini fyri farna árið.«

Endamálið við grannskoðanini hjá løgtingsgrannskoðarunum er ásett í § 3 í l.l. nr. 16 frá 26. apríl 1965 um grannskoðan av landsins almennu roknskapum:

»Løgtingsgrannskoðararnir fara igjøgnum hvørt árs roknskapir og ansa eftir, at allar inntøkur og útreiðslur eru komnar við inn í roknskapin og hevefti, at ongin útreiðsla í landskassaroknskapinum er bildin, sum hevur ikki heimild í fíggjarlóg ella aðrari játtanarlóg.

Løgtingsgrannskoðararnir skulu hava eyguni eftir, at tað hevur verið farsvarliga búsitt í fyrisitingini av miðlum landsins og virkjum tess.«

Í § 4 er ásett, at:
»fyri heinleikan av tí, sum í roknskapinum stendur, hava løgtingsgrannskoðararnir rætt til at taka váttanir o.t. frá roknskapargrannskoðanini sum tóg gott prógv.«

2. <u>*Viðmerkingar í seinasta frágreiðing løgtingsgrannskoðaranna:*</u>
Í sambandi við, at landskassaroknskapirnir fyri 1989-1991 vórðu lagdir fyri løgtingið til góðkenningar, samtykti løgtingið 11. desember 1995 uppskot til samtyktar frá løgtingsgrannskoðarunum dagfest 20. november 1995. Niðanfyri verður tikið samanum viðmerkingarnar, sum løgtingsgrannskoðararnir gjørdu, og víst verður á, um stig eru tikin til at bøta um viðurskifti, sum løgtingsgrannskoðararnir átaluðu tá.

Meirnýtsla
Løgtingsgrannskoðararnir átaluðu ta meirnýtslu, ið verið hevði, og at landsstýrið ikki fyrr enn í 1991 legði eina eykafíggjarlóg fyri tingið.

Løgtingsgrannskoðararnir meta, at játtanarviðurskiftini sum heild seinnu árini eru komin í eina tryggari legu.

Viðvíkjandi leiklutinum hjá fíggjarnevndini, í sambandi við tær nógvu eykajáttanir, ið givnar vórðu, mettu løgtingsgrannskoðararnir til, at reglur vórðu ásettar fyri virksemið hjá fíggjarnevndini, harumdir nær og undir hvørjum umstøðum umbøn um eykajáttan skal leggjast fyri tingið, og nær ein umbøn um eykajáttan kann leggjast fyri fíggjarnevndina, hvørji krøv ein umbøn um eykajáttan frá fíggjarnevndini skal taka, innlit í tey mál viðvíkjandi eykajáttan, ið viðgjørd verða í fíggjarnevndini o.s.fr.

Við nýggju stýrisskipanarlógini er ein stór broyting hend á hesum øki. Samanber § 44 verða eykajáttanir veittar við løgtingslóg. Bert um eitt mál hevur skund, kann fíggjarnevndin veita eykajáttanir, uttan so, at tveir fimtingar av nevndarlimunum krevja málið avgjørt við løgtingslóg. Eykajáttanir frá fíggjarnevndini verða at góðkenna við eykajáttanarlóg innan fíggjarárslok.

Upphøggingarstuðul
Átalað varð, at upphøggingarstuðulin, sum varð veittur eftir reglugerð nr. 27/1988, ikki í øllum førum varð veittur í tráð við reglugerðina. Mett varð, at stuðulin serliga hevði verið til fyrimuns fyri og hevði hjálpt persónum, felløgum og peningastovnum burtur úr fíggjarligum trupulleikum.

Serlán
Átalað varð, at treytirnar fyri lánsveitingum saubært lógfkunngerð í fleiri førum ikki vórðu hildnar.

Almannamál
Løgtingsgrannskoðararnir átaluðu umsitingina av pørtum av almannamálunum og mettu, at bæði føroyskir og danskir myndugleikar høvdu undirmett ta stóru uppgáva, ið yvirtókst av umsitingini av einum so stórum málsøki bar í sær.

Løgtingsgrannskoðararnir meta, at teir stóru umsitingarligu trupulleikarnir, sum framvegis eru á veitingarøkinum, í stóran mun stava frá, at lóggávan er sera trupul at umsita, samstundis sum landsstýrið ikki hevur havt neyðugan førleika og orku til at gera nakað munagott á hesum øki. Løgtingsgrannskoðararnir vóna, at uppskot landsstýrisins um nýggja føroyska pensiónslóggávu, sum nú á triðja stuni er lagt fyri tingið, fer at lætta og bøta um umsitingarligu trupulleikarnar á pensiónsøkinum.

Lóg nr. 13/1967 um veðhald fyri prioritetslánum

Løgtingsgrannskoðararnir átaluðu, at stig ikki longu fyrst í áttatiárunum vórðu tikin til at endurnýggja lóg nr. 13/1967. Viðvíkjandi ábyrgdar-/heimildarspurninginum hjá landsstýrinum mettu løgtingsgrannskoðararnir, at tað var avgerandi at vísa á, at Fíggjarnevnd Føroya Løgtings hevur samtykt øll veðhald fyri prioritetslánum til fiskiskip.

Veðhald og veðhaldsútlegg fyri lánum til fiskiskip

Eins og frá var greitt frá í álitinum frá løgtingsgrannskoðarunum dagfest 16. februar 1994 viðvíkjandi rokskapunum hjá Lønjavningar- og Ráfiskagrunninum, mettu løgtingsgrannskoðararnir, at ásannast mátti, at milliardstuðulin úr hesum grunnum, tey nógvu veðhaldini og studulslánini v.m. í sambandi við bygging og umbygging av skipum ikki høvdu verið samfelagnum til gagns í tann mun, ætlanin var.

Løgtingsgrannskoðararnir mettu, at ein av orsøkunum eisað var, at ter politisku avgerðirnar ikki høvdu bygt á eitt nóg gott fakligt grundarlag, hvørki tá talan var um vinkulmál ella út frá eini vinnuligari og samfelagsligari heildarmeting. Rakstrarætlanirnar vóru ikki nóg realistiskar og eftirfarandi, og fleiri av ídøgunum áttu neyvan at verið gjørdar; serliga um tað eisini vísir seg, at eginpeningurin, sum stórar dentir vórðu lagdar á í sambandi við, at hesi prosjekt vórðu góðkend í fíggjarnevndini, í fleiri førum ikki hevur verið til staðar.

Veðhald fyri lánum til flakavirkir

Mett varð, at fleiri av teimum veðhaldum fyri lánum til ter nógvu útbyggingar av flakavirkjum, ið gjørdar vóru, í stórri mun áttu at bygt á eina vinnuliga heildarmeting av tørvinum á framleiðslurøkn í mun til tilfeingi/rávøruøgd.

Veðhald fyri lánum til onnur virkir

Løgtingsgrannskoðararnir átaluðu mamagongd landsstýrisins í sambandi við fleiri av teimum veðhaldum, ið veitt vórðu.

Veðhald fyri lánum til kommunur

Løgtingsgrannskoðararnir átaluðu, at kommunur kundu fara undir útbyggingar við stórari lántøku, uttan at neyðug loyvi vóru givin samboert § 39 í kommunulógini.

Innkrevjing

Løgtingsgrannskoðararnir fegnaðust um tey stig, sum vóru tikin til at bøta um innkrevjingina á Gjaldstovuni.

Løgtingsgrannskoðararnir endurtóku átalurna í uppskoti til samtyktar um landskassaroknskapirnar, sum varð lagt fyri tingið í 1992, har átalað varð, at landsstýrið ikki hevði sýnt neyðugt fíggjarligt umhugsni viðvíkjandi útláns- og veðhaldsvirksemi landsins og í alt ov stóran mun umsitið givin lán og veðhald uttan at fylgja nóg væl við og taka neyðug stig mótvegis lántakarum, ið ikki høvdu hildið sínar skyldur. Mett varð, at hetta hevði ført manandi um landskassans tap og viðført stórar meirrenntuútreiðslur og verið til skaða fyri og forðað eini menning av tí partinum av vinnuni, ið hevði roynt at hildið sínar skyldur og bygt á eitt meira umhugsað grundarlag.

Vísandi til síðu 23 í tíðløgdu frágreiðing frá Grannskoðanardeild Landskassans, hevur grannskoðanardeildin í fleiri ár víst á, at skrásetingin av vinnulánum er sera ófullfíggjað, og at innkrevjing/málsviðgerð/uppfylging í nógvum førum als ikki er farin fram.

Løgtingsgrannskoðararnir átaladu tonsitingina av tollkreditti og marin um eingaferð til at endurskoða og broyta kunngerðina um tollkreditt, so ongi tap á hesum øki verða framyvir, og mælt varð somuleiðis til, at innkrevjingarlóggávan varð dagførd.

Vísandi til síðu 36-37 í grannskoðanarfrágreiðingini hevur umsitingin av reglum viðvíkjandi tollkreditti ikki verið í tráð við kunngerðina.

Løgtingsgrannskoðararnir átaladu, at stig ikki vórðu tikin mótvegis teim hundraðtals partafeløgunum, sum í mong ár hvørki hóa inn roknskap ella sjálvuppgáva.

Vísandi til s. 30-33 grannskoðanarfrágreiðingini verður víst á fleiri ógreiðleikar á hesum øki. Nevnast skal tó, at við Ll. nr. 168 frá 30. desember 1997 eru lógarbroytingar gjørdar, sum fara at bøta um umrøddu viðurskiftir.

Búskaparráðið

Løgtingsgrannskoðararnir átaladu, at landsstýrið í nokrum førum hevði tikið avgerð í málum, sum vóru send Búskaparráðnum til ummælis, uttan at bíða eftir svari, og í øðrum førum ikki fylgt tilmælum frá ráðnum, uttan at tað greiddi frambrongur. Hvørjar aðrar fyritreytir landsstýrið bygdi sínar avgerðir á.

Ymsir grannar

Løgtingsgrannskoðararnir átaludu, at landsstýrið veitti I/F Hitafelagnum eitt lán uppá 35 mió.kr. úr oljugrunninum í 1990, uttan at hetta varð lagt fyri tingið. Talan var um lán, sum ongin annar vildi veita. Viðvíkjandi veðhaldsgrunninum varð átalið, at ikki nóg mikið varð avsett í grunnin. - Hesir grannar eru avtiknir.

Viðvíkjandi Gistingarhúsgrunninum átaladu løgtingsgrannskoðararnir, at fyriskipuða mannagongdin viðvíkjandi lánsjáttanum ikki hevði verið nóg trygg, og ikki í øllum førum í tráð við reglugerðina.

Gistingarhúsgrunnarin er síðani umskipaður til Grunn Ferðavinnunnar, og hesin er umrøddur á s. 97-102 í hjáløgdu frágreiðing frá Grannskoðanardeild Landskassans (12.2 Grunnur Ferðavinnunnar).

Roknskaparviðurskifti

Vísandi til §§ 3 og 5 í Ll. nr. 33 frá 23. mars 1994 um landsins almenna roknskaparhald, sum kom í gildi 1. januar 1995, átaladu løgtingsgrannskoðararnir, at landsstýrið ikki enn hevði ásett grundleggjandi roknskaparreglur fyri landsumsitingina og teir landsstovnar v.m., sum lógin fevnir um.

Á s. 12-15 í hjáløgdu frágreiðing frá Grannskoðanardeild Landskassans eru broytingarnar á hesum øki umrøddar. Vísandi til § 3 í lógini hevur landsstýrið við kunngerð nr. 114 frá 22. august 1996 ásett nærri reglur um roknskaparhald landsins, og í løtuni arbeiðir ein nevnd við at gera tær vegleiðandi reglur, sum álagdar eru landsstýrinum at gera samboert § 5 í lógini.

3. <u>Frágreiðing frá Grannskoðanardeild Landskassans</u>:

Løgtingsgrannskoðararnir hava gjøgnumgingið grannskoðanarfrágreiðingina frá Grannskoðanardeild Landskassans og løgtingsins statsautoriseraða grannskoðara dagfest 3. desember 1997, sum er viðløgd sum fylgiskjal til hetta løgtingsmál. Harumframt hava løgtingsgrannskoðararnir kunnað seg nærri um ávís øki við at gjøgnumganga arbeiðsskjøt, fundarfrágreiðingar, viðmerkingar og samskifti við landsstýriðvumsitingina.

Løgtingsgrannskoðararnir hava gjørt niðanfyristandandi viðmerkingar við støði í hesi frágreiðing:

4. <u>Játtanarviðurskifti 1992</u>:

4.1 Broytingar frá fíggjarlóg til eykafíggjarlóg

Vísandi til skjal 1, yvirlit yvir játtanar- og roknskaparatøl 1992, varð á fíggjarlógini roknað við einum rakstrar- og fløgumundirskoti uppá 91 mió.kr.; men á eykafíggjarlógini varð rukstrur- og fløgumundirskotið mett til 903 mió.kr.

Tríggjar høvuðsorsøkir eru til hesa stóru øking:

1. <u>Lægri inntøkur á §§ 1 og 2</u>

Hesar inntøkur vórðu mettar 261 mió.kr. lægri á eykafíggjarlógini. Á s. 110-111 í grannskoðanarfrágreiðingini er nærri útgreinað, hvørjar inntøkur talan er um.

2. <u>Hægri útreiðslur á § 18</u>

Útreiðslurnar á fíggjarlógini til § 18 vórðu fatt mettar til 84 mió.kr. Á eykafíggjarlógini vórðu hesar hækkaðar við 330 mió.kr. Orsøkin var, at løgtingið á heysti 1992 játtaði 300 mió.kr. til fíggingargrunnin frá 1992, sum síðani setti peningin í P/F Sjóvinnubankan, sum var komin í fíggjarligar trupulleikar. Harumframt varð neyðugt at veita eina stóra eykajáttan til at bjarga Menningargrunninum.

3. <u>Hægri útreiðslur á § 21</u>

Á fíggjarlógini vórðu avsettar 80 mió.kr., sum mettar útreiðslur til effektivar veðhaldsbindingar, men á eykafíggjarlógini var metingin hækkað til 226 mió.kr.

Á síðu 119 í hjáløgdu frágreiðing verður m.a. víst á, at hvørki í viðmerkingunum ella í fylgiskjølunum til fíggjarlógaruppskotið hevði landsstýrið útgreinað, hvussu komið var fram til upphæddina uppá 80 mió.kr. til effektivar veðhaldsbindingar. Í mars 1992 og í september 1992 bað grannskoðanardeildin landsstýrið um at greiða frá metingunum av útreiðslum á § 21. Landsstýrið svaraði onguntíð hesum fyrispurningum. Løgtingsgrannskoðararnir átala, at landsstýrið á fíggjarlógini fyri 1992, eftir øllum at dømna hevur gjørt eina órealistiska meting av útreiðslunum á § 21. Løgtingsgrannskoðararnir átalu eisini, at landsstýrið ikki hevur svarað fyrispurningum frá grannskoðanardeildini hesum viðvíkjandi.

- - - - -

Av broytingum annars frá fíggjarlóg til eykafíggjarlóg kunnu nevnast, at § 5 varð broytt frá at vera nettorentuinntøkur til at vísa bruttorentuinntøkurnar.

Ein onnur týðandi broyting, sum hendi frá fíggjarlóg til eykafíggjarlóg, var, at játtanir undir § 6 duttu burtur. § 6 hevur í mong ár verið nýtt sum játtanargrein til stovnar, sum í stóran mun fíggja sítt virksemi við "egnum" inntøkum ella gjøldum. Fleiri av hesum stovnum hava havt sín egna likviditet, og nakrir hava eisini sjálvir umsitið síni lán. Hesir stovnar hava sostatt havt eitt leysari tilknýti til fíggjarlóg, landsbókhald og landskassans gjaldføri; men talan er um stovnar undir landsstýrinum, og hesir skulu tí hava fíggjarheimild frá løgtinginum til at halda inntøkur og útreiðslur. Løgtingsgrannskoðararnir hava síðani spurt landsstýrið, um tað er í tráð við stýrisskipanarlógina, at Telefonverkið og aðrir líknandi stovnar ikki longur verða tiknir við á fíggjarlógina. Landsstýrið hevur svarað, at tað ikki er í tráð við stýrisskipanarlógina, at tílíkir stovnar ikki verða tiknir við á fíggjarlógina. Flest allir stovnar eru síðani komnir við aftur á fíggjarlógina.

4.2 Roknskapartøl mótvegis játtan á eykafíggjarlógini

Vísandi til skjal 1, yvirlit yvir játtanar- og roknskapartøl 1992, er samanlagt so at siga samsvar ímillum roknskapartøl og eykafíggjarlógina. Á eykafíggjarlógini varð roknað við einum rakstrar- og fløgumundirskoti uppá 903 mió.kr., roknskapurin vísir 909 mió.kr.

Á s. 110-112 í grannskoðanarfrágreiðingini eru frávikini ímillum roknskapar- og játtanartøl á inntøkusíðuni nærri útgreinað. Viðvíkjandi inntøkuskatti hava løgtingsgrannskoðararnir heft seg við, at útgreiningin av játtanini á fíggjarlógini ikki samsvarar við útgreiningina av roknskapartølum. Á eykafíggjarlógini varð hørt nakað um hetta. Grannskoðanardeildin vísir eisini á s. 111 á, at onki samsvar er ímillum fleiri játtanar- og roknskapartøl viðvíkjandi DIS, FAS o.l.

Á útreiðslusíðuni er tann størsta einstaka meirnýtslan 16,5 mió.kr. Henda viðvíkur stuðuli til Menningargrunn Íðnaðarins á § 18. Samtøkt roknskapinum hevur Menningargrunnurin fingið 74,5 mió.kr., meðan játtanin einans er uml. 58 mió.kr. Vísandi til s. 118 í grannskoðanarfrágreiðingini vórðu upprunaliga játtaðar 12 mió.kr. á fíggjarlógini til Menningargrunnin, og fíggjarnevndin játtaði í februar 1992 at veita eina eykajáttan uppá 62,5 mió.kr. Samlaða játtanin var sostatt 74,5 mió.kr., men játtanin á eykafíggjarlógini vísir einans eina upphædd uppá uml. 58 mió.kr.

Ein stór meirnýtsla er á § 13. Talan er um keyp av partabrøvum í P/F Atlantic Airways. Vísandi til s. 115 í frágreiðingini játtaði løgtingið 75 mió.kr., men samtøkt landsroknskapinum eru nýttar 85,7 mió.kr. t.v.s. ein meirnýtsla uppá 10,7 mió.kr. Talan er ikki um nakra veruliga meirnýtslu, tí manurin stendst av, at gamli partapeningurin í felagnum varð niðurskrivaður. Í hesum sambandi staðfesti landskassin eitt tap uppá 10,7 mió.kr., sum er bókað á sama rakstrarstað.

Ein annur stór meirnýtsla á § 13 er viðvíkjandi játtanini til Strandfaraskip Landsins. Vísandi til s. 114-115 í grannskoðanarfrágreiðingini hava løgtingsgrannskoðararnir áður átalað, at Strandferðslan aftur í 1992 hevði brúkt nógv meira, enn játtað varð á fíggjarlóg/eykafíggjarlóg, og at landsstýrið enn einaferð hevði sett eina ónalítiska upphædd á fíggjarlógina.
Við at gjøgnumganga landsroknskapin fyri 1992 sæst, at burtursæð frá omanfyri nevndu meirnýtslu er bert talan um fáar játtanir, sum hava eina meirnýtslu, og fáar av hesum eru lutfalsliga stórar. Løgtingsgrannskoðararnir hava á § 11 heft seg við meirnýtsluna til umbygging av Tinganesi, á § 12 Klaksvíkar Sjúkrahús og á § 14 HF skeiðið í Suðuroy. Løgtingsgrannskoðararnir átala ta meirnýtslu, ið hevur verið í 1992.

Vísandi til s. 118 í grannskoðanarfrágreiðingini er játtanin til kolagrevstur undir § 18 ikki rætt, og samsvar er heldur ikki ímillum eykafíggjarlóg og broytingaruppskot frá fíggjarnevndini hesum viðvíkjandi.

Vísandi til s. 116-118 í grannskoðanarfrágreiðingini viðvíkjandi játtanini til fiskivinnu á § 16 vísa roknskaparætlini í landsroknskapinum ikki rætt myndina av nýtsluni. Samtøkt landsroknskapinum er samsvar ímillum játtanina uppá 251 mió.kr. og nýtsluna viðvíkjandi lógarbundnum útreiðslum (dagstudningur, minstaløn o.a.); men samtøkt roknskapinum hjá Lønjavningargrunninum er talan um eina nýtslu uppá 260 mió.kr., og sostatt er talan um eina meirnýtslu uppá 9 mió.kr. Løgtingsgrannskoðararnir átala, at roknskaparætlini í landsroknskapinum ikki vísa veruligu nýtsluna.

5. *Játtanarviðurskifti 1993:*

5.1 Broytingar frá fíggjarlóg til eykafíggjarlóg
Vísandi til skjal 2, yvirlit yvir játtanar- og roknskaparætlt 1993, varð á fíggjarlógini roknað við einum rakstrar- og fløguyvirskoti uppá 29 mió.kr., men á eykafíggjarlógini varð rakstrar- og fløgunundirskotið mett til 2,6 mia.kr.

Tvær høvuðsorsøkir eru til hetta stóra undirskot:

1. § 28, serligar útreiðslur
Vísandi til s. 130-131 í grannskoðanarfrágreiðingini vórðu 2,21 mia.kr. játtaðar sum kapitalveiting til Føroya Banka og Sjóvinnubankan umvegis Fíggingargrunnin frá 1992. Á s. 6-7 í landsroknskapinum fyri 1993 verður greitt nærri frá teimum trimum avtalunum ímillum landsstýrið og danska ríkisstjórnina í sambandi við bankahjargingarnar. Á § 28 vórðu harumframt játtaðar 65 mió.kr. til at bjarga Menningargrunninum og 15 mió.kr. til Íðnaðargrunnin. Higini kann nevnast, at løgtingið við løgtingslóg játtaði at avskriva restskuldina uppá 57,5 mió.kr. av lánum til Húsalánsgrunnin, upprunaliga veitt úr Oljugrunninum; men henda upphædd er ikki førd á játtanarroknskapinum, men er útreiðsluført yvir útjavningarkonto.

2. Lægri inntøkur á §§ 1 og 2
Hesar inntøkur vóru mettar 209 mió.kr. lægri á eykafíggjarlógini. Á s. 121-122 í grannskoðanarfrágreiðingini er nærri útgreinað, hvørjar inntøkur talan er um.

Vísandi til s. 126 í grannskoðanarfrágreiðingini var ein fyritreyt fyri nøkrum játtanum á § 14, útbúgving og gransking, at ymsar umskipanir skuldu fara fram. Hetta hendi ikki, og løgtingsgrannskoðararnir meta, at fíggjarlógaruppskotið á hesum øki ikki var nóg væl fyrireikað.

5.2 Rokuskapartøl møtvegis játtan á eykafíggjarlógini
Í álitinum til eykafíggjarlógaruppskotið vísti fíggjarnevndin á, at hon hevði tá fatan, at eykafíggjarlógin bert skuldi fevna um lógarbundnar meirútreiðslur og eykajáttanir frá fíggjarnevndini. Fíggjarnevndin vísti á, at í uppskotinum til eykafíggjarlóg vóru fleiri beinleiðis umsóknir frá landsstýrinum um eykajáttan. Fíggjarnevndin undirstrikaði, at landsstýrið átti at søkt fíggjarnevndina um eykajáttan, so skjótt tørvurin var staðfestur, og ikki tá ið árið varð gjørt upp.

Viðvíkjandi inntøkum verður á s. 121 í grannskoðanarfrágreiðingini víst á, at ongin játtan var til FAS-endurgjald í 1993. Grannskoðanardeildin vísir eisini á, at útreiðslur til FAS-endurgjald áttu at verið bókaðar aðra staðni enn undir inntøkuskatti.

Størsti munurin ímillum játtan og rokuskapartøl er á **§ 22**, rentuútreiðslur. Hesar vóru 326,5 mió.kr. í mun til játtanina uppá 317 mió.kr.

Á **§ 16**, Fiskivinna, er ein meirnýtsla uppá 6,4 mió.kr. viðvíkjandi studningi til fiskivinnuna (løgustuðul). Vísandi til s. 128 í grannskoðanarfrágreiðingini er ein ørsøk, at 4 mió.kr. vóru fluttar til Tryggingargrunnin fyri avreiðingar og lønir og bókaðar á hesum rakstrarstaði. Fíggjarnevndin játtaði, at hesin peningur kundi brúkast, men álagt varð landsstýrinum at finna peningin innan karmarnar á fíggjarlógini fyri 1993. Løgtingsgrannskoðararnir átala, at upphæddin varð bókað sum studningur til fiskivinnuna, og at ongi stig vóru tikin til at finna tílsvarandi sparingar innan karmarnar á fíggjarlógini.

Í 1993 varð inntøkutrygd hjá fiskimonnum flutt undir **§ 19**, Almannamál, og her er talan um eina meirnýtslu uppá 7,7 mió.kr. Á s. 129 í grannskoðanarfrágreiðingini verður víst á, at samlaðar landsrokanskapirnar eru 100,5 mió.kr. nýttar til inntøkutrygd v.m. hjá fiskimonnum, men nýtslan samsvarar ikki við rokanskapartølini í fyribils rokanskapinum hjá Lønjavningargrunninum, sum vísa eina nýtslu uppá 93,1 mió.kr. Løgtingsgrannskoðararnir átala, at samsvar ikki er ímillum rokanskapartølini.

Í 1993 hevði Strandferðslan á **§ 13** eina meirnýtslu uppá 3 mió.kr., hóast eina eykajáttan uppá góðar 7 mió.kr. Í uppskoti til samtyktar frá løgtingsgrannskoðarunum (løgtingsmál nr. 4/9 1995), viðvíkjandi góðkenning av roknskapinum hjá Strandfaraskipum Landsins fyri fíggjarárini 1993 og 1994 varð víst á fleiri átaluverd viðurskifti.

Av øðrum størri meirnýtslum í 1993 kunnu nevnast útreiðslur á **§ 12** viðvíkjandi Ríkishospitalinum, Mentikulstovuni á **§ 11**, og harumframt høvdu nakrar játtanir undir **§ 14**, Útbúgving og gransking, eina meirnýtslu. Á s. 127 í grannskoðanarfrágreiðingini verður víst á, at Læraraskúlin í 1993 hevði eina meirnýtslu, hóast hetta ikki sæst í landsroknskapinum. Henda meirnýtsla varð fíggjað við kassakreditti.

Løgtingsgrannskoðararnir átala tá meirnýtslu, sum er farin fram í 1993, men samstundis verður víst á, at flest allar játtanir hava eina minnimýtslu.

I. <u>Játtanarviðurskifti 1994</u>:

A. Broytingar frá fíggjarlóg til eykafíggjarlóg
Vísandi til skjal 3, yvirlit yvir játtanar- og roknskapartøl 1994, varð á fíggjarlógini fyri 1994 roknað við ein-

um rakstrar- og íløguundirskoti uppá 261 mió.kr., men á eykafíggjarlógini varð rakstrar- og íløguundirskotið mett til 462 mió.kr.

Høvuðsorsøkin til hetta vøkstur er, at meginreglurnar fyri, nær rentur skulu útreiðsluførast, vórðu broyttar. Á s. 141-142 í grannskoðanarfrágreiðingini er hetta nærri útgreinað. Um meginreglurnar ikki vórðu broyttar, høvdu rentuútreiðslurnar í 1994 verið munandi lægri. Hinvegin vildu rentuútreiðslurnar í 1995 verið munandi hægri.

Løgtingsgrannskoðararnir hava heft seg við, at undir rentuútreiðslum verður bókað ein samsýning/umsitingargjald til Landsbankan uppá góðar 6 mió.kr. Landsbankin fær, sambært sáttmála við landsstýrið, eina árliga samsýning uppá 1%o av lánssaldo landskassans við ársenda. Løgtingsgrannskoðararnir ivast í, um nakað samsvar er millum hesa stóru upphæddd og ta tænastu, ið Landsbankin veitir á hesum øki. Mælt verður landsstýrismannintum til at kanna hesi viðurskifti. Løgtingsgrannskoðararnir hava eisini hett seg við, at á s. 22 í grannskoðanarfrágreiðingini verður víst á, at tíðaravmarkingin av bæði rentum og kurstapum, ið landsbankin stendur fyri, hava ført við sær nógv meirarbeiði vegna avstemmingartrupulleikar mótvegis bókhaldinum á Gjaldstovuni.

Av øðrum størri broytingum kann nevnast, at undir **§ 16** varð játtanin til íløgustuðul á eykafíggjarlógini hækkað við 18 mió.kr. Hetta er umrøtt á s. 138 í grannskoðanarfrágreiðingini. Løgtingsgrannskoðararnir átala, at landsstýrið metti su skeivt, tí útreiðslurnar á hesum øki ganga greitt fram av viðmerkingunum til lógirnar um íløgustuðul.

Ein annur stór hækking á eykafíggjarlógini er játtanin til Strandferðsluna á **§ 13**, sum varð hækkað við 21,1 mió.kr.

Játtanin til inntøkutrygd undir **§ 19** varð hækkað úr 87 til 99 mió.kr.

Á inntøkusíðuni fóru stórar hækkingar og lækkingar fram ímillum ley yvirsu inntøkuslógini, men samanlagt varð játtanin á eykafíggjarlógini umleið tann sama, burtursæð frá at parturin av avlopi Tjóðbankans, sum varð mettur til 25 mió.kr., varð settur til 0.

6.2 Roknskapartøl mótvegis játtan á eykafíggjarlógini

Vísandi til s. 132 í grannskoðanarfrágreiðingini upplýsti landsstýrismaðurin í fíggjarmálum í viðmerkingum til eykafíggjarlógaruppskotið, at hann fór at taka stig til at tryggja, at nýtslan á einum rakstrarstaði var játtað, antin yvir fíggjarlógina ella við eykajáttanum, áðrenn hon var goldin út. Somuleiðis skuldu avvarðandi stovnsleiðarar søkja um eykajáttan í árinum, um teir mettu, at lógarbundnar útreiðslur vóru undirmettar á fíggjarlógini.

Í álitinum til eykafíggjarlógaruppskotið metti fíggjarnevndin, at skipanin við nettotølum ikki var bætt, tí stovnar við størri inntøkum kundu økja um útreiðslurnar. Fíggjarnevndin mælti til, at skundað varð undir arbeiðið at fáa greiðari reglur viðvíkjandi játtanum og roknskaparhaldi. Fíggjarnevndin vísti aftur á, at eykafíggjarlógin á útreiðslusíðuni bert átti at fevna um lógarbundnar útreiðslur og um eykajáttanir, sum vóru játtaðar av landsstýrinum og av fíggjarnevndini. Vísa varð eisini á, at umsóknir um tílíkar eykajáttanir áttu at verið sendar fíggjarnevndini/løgtinginum til viðgerðar, áðrenn eykafíggjarlógin varð løgd fram.

Viðvíkjandi uppskotinum til eykafíggjarlóg vísti grannskoðanardeildin á, at nógv roknskapartøl fyri 1993, sum vórðu víst í uppskotinum til eykafíggjarlóg fyri 1994, vóru skeiv. Mælt varð til at leggja arbeiðið við fíggjarlógini soleiðis til rættis, at tílík frávik ikki aftur komu fyri.

Á s. 134 í grannskoðanarfrágreiðingini verður víst á, at komtoin »skattur fyri 01.04.1984«, sum vísir eina útreiðslu uppá 5,7 mió.kr., onga játtan hevur.

Á útreiðslusíðuni halda flest allar játtanir og vísa eina minninýtslu.

Nøkur fá undantøk eru:

- Hóast eina eykajáttan uppá 0,6 mió.kr. í árinum vísir játtanin til løgtingsmenn á **§ 10** eina meirnýtslu uppá uml. 0,8 mió.kr. Í 1993 var talan um eina tilsvarandi meirnýtslu. Løgtingsgrannskoðararnir halda tað vera óheppið, at hetta rakstrarstað hevur eina so lutfalsliga stóra meirnýtslu.

- Hóast Matrikulstovan á **§ 11** fekk eina eykajáttan uppá 1,7 mió.kr., var talan um eina meirnýtslu uppá uml. 0,4 mió.kr. í 1994.

- Hóast eina lutfalsliga stóra eykajáttan hevði játtanin á **§ 12** til útreiðslur viðvíkjandi Ríkishospitalinum eina meirnýtslu uppá 2 mió.kr. Á s. 68 í grannskoðanarfrágreiðingini eru játtanarviðurskiftini á hesum økki umrøddi. Víst verður m.a. á, at útreiðslurnar á hesum rakstrarstaði eru umleið 10 mió.kr. hægri enn í 1990. Í hesum sambandi vísir sjúkrahússtjórin á, at nýtslan av vanligum seingjardøgum á Ríkissjúkrahúsinum er áleið hin sama, og at vøksturin í útreiðslunum stavar frá dýrari viðgerð. Víst verður á, at Ríkissjúkrahúsið seinastu árini hevur havt stórar fíggjarligar trupulleikar, og m.a. tí eru gjørdar umfatandi broytingar í háttinum at rokna sær samsýning fyri tænasturnar. Sjúkrahússtjórin heldur, at tað í størri mun átti at verið fylgt við, hvat fekst fyri pengarnar í hvørjum einstøkum føri.

- Á skúlaøkinum **§ 14** hevði Tekniski Skúli í Tórshavn eina meirnýtslu uppá 580 t.kr. Sambært landsroknskapinum var samsvar millum játtan og nýtslu hjá Føroya Handilsskúla og Tekniska Skúla í Klaksvík, men á s. 138 í grannskoðanarfrágreiðingini verður víst á, at millumrokningarnar á Tekniska Skúla í Klaksvík, Tekniska Skúla í Tórshavn og hjá Føroya Handilsskúla viðvíkjandi ov nógv ella ov lítið útgoldnum studningi ikki ganga fram av landsroknskapinum, og hesin vísir sostatt ikki eina fullfíggjaða mynd viðvíkjandi nýtslu mótvegis játtanum til hesar skúlar. Sum dømi verður víst á, at sambært roknskapinum hjá Tekniska Skúla í Klaksvík var nýtslan í 1994 og 1995 ávikavist 230 t.kr. og 538 t.kr. minni enn uppgjørda nýtslan sambært landsroknskapinum. Løgtingsgrannskoðararnir átala hetta ósamsvar og mæla til, at greiða fæst á millumrokningunum, so at landsroknskapurin kemur at vísa veruligar nýtsluna í einum fíggjarári.

- Á s. 140 í grannskoðanarfrágreiðingini verður víst á, at játtanin undir **§ 19**, Innøkutrygd hjá fiskimonnum, samsvarar við roknskapin. Men nýtslan sambært landsroknskapinum samsvarar ikki við roknskapartølini í fyribilsroknskapinum hjá Lønjavningargrunninum. Vísandi til s. 84-86 hava løgtingsgrannskoðararnir í áravís víst á ógreiðu roknskaparviðurskiftini á hesum øki. Løgtingsgrannskoðararnir hava í áravís spurt eftir endaliga roknskapinum hjá Lønjavningargrunninum fyri 1992 og frametir (sambært lóg skal grannskoðaður roknskapur og frágreiðing nevndarinnar fyri farna ár vera send løgtingi og landsstýri í avriti innan 1. juli á hvørjum ári). Løgtingsgrannskoðararnir hava heldur ikki fingið nakað svar uppá viðmerkingar/fyrispurningar til landsstýrismannin í fiskivinnumálum viðvíkjandi fyribilsroknskapum fyri 1992-1994 hóast eitt ótal av áminningarskrivum.

Løgtingsgrannskoðararnir átala, at landsstýrismaðurin í fiskivinnumálum ikki hevur greitt umroddu roknskaparviðurskifti og als ikki svarar skrivum frá løgtingsgrannskoðarunum.

7 Fíggjarstøðan 1992-1994:

Yvirlit yvir ogn og skuld í landsroknskapinum árini 1991-1994

(mió.kr.)

	1991	1992	1993	1994
OGN				
Kapitalogn í landsfyritøkum	194	207	218	132
Parta- og lánsbrøv	19	84	83	84

Rentu- og avdráttarfrí lán	56	54	51	69
Útlán	452	98	99	76
	721	443	451	361
Tænastu- og vøruskuldarar	34	28	17	18
Skatta-, toll- o.t. skuldarar	288	134	153	109
Millumrokn. við kommunur og alm.stovnar o.t.	105	97	104	83
Aðrir skuldarar og tíðaravmarkingar	163	142	150	138
	590	401	424	348
Bundin peningur / Innist. í Landsbankanum	257	535	653	848
Banka-, girokonti og kassapeningur	154	104	162	93
	411	639	815	941
Í alt	1.722	1.483	1.690	1.650
SKULD				
Innanlandsskuld	746	742	1.150	1.304
Uttanlandsskuld	1.935	3.006	5.427	5.660
Skuld í alt	2.681	3.748	6.577	6.964
Útjavningarkonto	-959	-2.265	-4.887	-5.314
Í alt	**1.722**	**1.483**	**1.690**	**1.650**

Tað sum serliga sermerkir fíggjarstøðuna er, at samlaða skuldin í tíðarskeiðnum 1992-94 er vaksin við umleið 4,3 mia.kr., úr 2,7 til umr. 7 mia.kr. Í sama tíðarskeiði er innistandandi í peningastovnum og landsbankanum vaksið úr umr. 0.4 mia.kr. til umleið 0.9 mia.kr.

Ein høvuðsorsøk til henda stóra vøkstur í skuldini eru tey lán uppá umr. 2,5 mia.kr., sum eru tikin til at bjarga Sjóvinnubankanum og Føroya Banka.

Á s. 15-23 í grannskoðanarfrágreiðingini eru ymisk viðurskifti viðvíkjandi teim einstøku rokningarpostunum í fíggjarstøðuni umrødd.

Løgtingsgrannskoðararnir taka undir við at fáa greiði á rokningarpostinum Landsfyritøkur.

Løgtingsgrannskoðararnir átala, at fleiri partabrøv, sum onki virði hava, eru tikin við, og at ongin føst mannagongd er viðvíkjandi goymslu av partabrøvum.

Viðvíkjandi virðismeting av útlánum og øðrum skuldarum hava løgtingsgrannskoðararnir heft seg við, at avsetingarnar móti tapum byggja á eitt grundarlag, sum upprunaliga varð gjørt fyri rokningarárið 1991. Hetta er í nógvum førum als ikki nýtiligt grundarlag í dag, tí so nógv er broytt síðani. Gjaldstovan er samd í hesum, men hevur ikki havt orku til at gera nakra nøgva virðismeting.

Løgtingsgrannskoðararnir hava heft seg við, at í grannskoðanarfrágreiðingini á s. 19-20 verður vist á tann stóru óvissu, sum er viðvíkjandi avstemmingum av skattaeftirstøðum í bókhaldinum á Gjaldstovuni, og at Gjaldstovan ikki hevur havt orku til at greiða teir mongu avstemmingartrupulleikarnar. Løgtingsgrannskoðararnir meta, at talan er um eitt týðandi øki, og heita tí á landsstýrismannin um at taka stig til at loysa umrøddu trupulleikar.

Innistandandi í Landsbankanum var ultimo 1994 umr. 850 mió.kr. Á s. 20-21 í grannskoðanarfrágreiðingini

verða ymisk viðurskifti hesum viðvíkjandi umrødd. Innlánini í Landsbankanum skulu í minsta lagi svara til 15% av bruttotjóðarúrtøkuni. Grannskoðanardeildin vísir á, at útrokningin av bruttotjóðarúrtøkuni byggir á eitt leyst grundarlag. Grannskoðanardeildin vísir eisini á, at tað má sigast at vera óheppið, at hugtøkini »landskassin« og »landsstovnar« ikki er nóg greitt lýst, hvørki í lógini um Landsbankan, í lógini um innlán í Landsbankan og lán úr Landsbankanum ella í viðmerkingunum til lógaruppskotini. Vísa verður eisini á, at í sambandi við tulking av hugtakinum »landsstovnur« hevur Landsbankin m.a. tikið útgangsstøðt í einum notati um landsstovnar frá 1991, ið má sigast at vera heldur ófullfíggjað.

Løgtingsgrannskoðararnir mæla landsstýrismanninum í fíggjarmálum til at fáa greiðu á hesum viðurskiftum.

8. *Aðrar viðmerkingar:*

8.1 Fíggjarmál

Á s. 8-11 í hjáløgdu grannskoðanarfrágreiðing eru broytingar í fíggjarlógarmannagongdini seinnu árini umrøddar. Við fíggjarlógaruppskotinum fyri 1996 varð farið undir at broyta fíggjarlógarmannagongdina. Uppsetingin av fíggjarlógini, sum var nýtt síðani miðskeiðis í 60-árunum, varð broytt, og farið varð burtur frá skipanini við fylgiskjølum til fíggjarlógina.

Á s. 10 vísir grannskoðanardeildin á, at nógvir feilir og misskiljingar vóru í fíggjarlógaruppskotinum fyri 1996 í mun til ta skipan, fíggjarnevndin og landsstýrið tóku undir við at fara yvir til. T.d. vóru fleiri almennir stovnar ikki á fíggjarlógini, fleiri játtanarsløg vóru skeiv, skipanin við bruttoútlum var ikki konsekvent, nógvir feilir/misskiljingar vóru í sundurgreiningunum av fleiri játtanum, og í nøkrum førum var als ikki samband ímillum játtan og játtanarsundurgreining o.s.fr. Grannskoðanardeildin vísir tó á, at við fíggjarlógaruppskotinum fyri 1996 vóru hend stór framstig viðvíkjandi lýsing og útgreining av nógvum játtanum, og talan her var um ábøtur, sum kundu koma at fáa varandi virði. Grannskoðanardeildin vísir á, at fíggjarlógaruppskotið fyri 1997 var munandi betur úr hondum greitt enn uppskotið fyri 1996, og í viðmerkingunum til fíggjarlógaruppskotið er greitt nærri frá ræðisreglum og serstøkum ásetingum fyri tey einstøku játtanarsløgini.

Løgtingsgrannskoðararnir halda, at broytingarnar av fíggjarlógarmannagongdini seinnu árini ikki altíð hava verið nóg væl umhugsaðar, og at løgtingið ikki er kunnað um grundleggjandi broytingar av uppsetingum, fyrr enn uppskotið er lagt fyri tingið. Her verður m.a. hugsað um brutto/nettotøl, sundurbýtið í játtanarsløg, høvuðskonti/undirkonti, roknskapartøl fyri farin ár í mun til framtíðarmetingar o.s.fr. Løgtingsgrannskoðararnir meta, at tað hevði verið skilagott við einum samstarvi/samskifti ímillum løgtingið og landsstýrið um tílík grundleggjandi viðurskifti í góðari tíð, áðrenn eitt fíggjarlógaruppskot verður lagt fyri tingið.

Á s. 12-15 í grannskoðanarfrágreiðingini (2.2 Broyting av roknskaparviðurskiftum landsins) eru broytingarnar á hesum øki umrøddar. Vísandi til § 3 í lógini hevur landsstýrið við kunngerð nr. 114 frá 22. august 1996 ásett nærri reglur um roknskaparhald landsins, og í løtuni arbeiðir ein nevnd við at gera tær vegleiðandi reglur, sum álagdar eru landsstýrinum at gera sambært § 5 í lógini.

Løgtingsgrannskoðararnir fegnast um ta stóru orku, sum umsitingin hevur lagt í at bøta um og greiða roknskaparviðurskiftini.

Í frágreiðingini vísir grannskoðanardeildin tó á, at á fleiri týðandi økjum verða uppgávur, sum sambært roknskaparkunngerðini eru álagdar Fíggjar- og Búskapardeildini, Gjaldstovuni o.o., ikki loystar. Grannskoðanardeildin hevur í skrivum kunnað landsstýrið um, at Gjaldstovan, orsakað av stóru arbeiðsbyrðuni í sambandi við tær nógvu broytingarnar á roknskaparøkinum, er komin aftur úr við týðandi arbeiðsuppgávum, og at stórur tørvur er á fleiri starvsfólkum á roknskaparøkinum.

Løgtingsgrannskoðararnir mæla landsstýrismanninum til at taka neyðug stig til at tryggja, at roknskaparviðurskiftini koma í eina trygga legu.

Vísandi til síðu 23 í grannskoðanartrágreiðingini (2.4 innkrevjing av vinnulánum), hevur grannskoðanardeildin í fletri ár víst á, at skrásetingin av vinnulánum var sera ófullfíggjað, og at innkrevjing/málsviðgerð/-uppfylging í nógvum førum als ikki er farin fram. Grannskoðanardeildin vísir á, at talan hevur verið um eina tilvildarliga og sera ymiska viðgerð av borgarum á hesum øki.

Løgtingsgrannskoðararnar meta, at landsstýrið hevur misrøkt sínar skyldur á hesum øki.

Ábyrgdin av innkrevjingini av vinnulánum varð í 1997 flutt frá Fíggjar- og Búskapardeildini í landsstýrinum til Gjaldstovuna.

Á s. 15 í grannskoðanartrágreiðingini vísir grannskoðanardeildin á, at tryggingarviðurskiftini hjá almennum stovnum eru ógreið, og at landið óivað eisini kundi spart pening á hesum øki, um hesi vórðu samskipað. Víst verður á, at landsstýrið í 1992 setti eina kanning í verk, og at grannskoðanardeildin síðani uttan úrslit hevur spurt landsstýrið um, hvat er hent í málinum. Løgtingsgrannskoðararnir mæla landsstýrinum til at taka henda spurning til viðgerðar aftur.

8.2 Skattamál

Á s. 25-43 í grannskoðanartrágreiðingini eru ymisk viðurskifti umrødd, sum hava við skattamál at gera.

Løgtingsgrannskoðararnir hava heft seg við, at fleiri av ásetingunum í trygdarreglunum, sum stýrið fyri T&S hevði ásett, ikki vórðu fylgdar, m.a. tí at reglurnar ikki vóru nóg greiðar, og at tørvur var á at endurskoða hesar á fleiri økjum. Løgtingsgrannskoðararnir fegnast um, at eitt stórt arbeiði síðani er gjørt fyri at endurskoða og bøta um trygdarreglurnar.

Á s. 25-26 verður víst á, at sáttmálaviðurskiftini ímillum P/F Elektron og Toll- og Skattstovu Føroya eru ógreið, m.a. tí talan er um gamlar standardsáttmálar, og í fleiri førum er ógreitt, hvussu orðingar í sáttmálunum, trygdaravtaluni og trygdarreglugerðini skulu skiljast. Grannskoðanardeildin hevur tí mælt til at endurskoða øll sáttmálaviðurskiftini. Løgtingsgrannskoðararnir mæla landsstýrismanninum til at tryggja, at hesi viðurskifti koma í rættlag.

Á s. 27 verður víst á, at fleiri av EDV-skráunum hjá Toll- og Skattstovu Føroya ikki eru góðkendar. Mælt verður landsstýrismanninum til at fáa greiði á hesum.

Á s. 28-30 er umsitingin av § 118 í skattalógini umrødd. Løgtingsgrannskoðararnir átala, at ontki varð gjørt við at kanna eftir, um allar váttanir komu aftur frá arbeiðsgevarunum, og eru samdir við Grannskoðanardeild Landskassans, sum heldur tað vera óheppið, at tað ongar avleiðingar hevur havt fyri teir arbeiðsgevarar, ið ikki hava hildið sínar skyldur sambært § 118 í skattalógini. (Nevnast kann, at § 118 síðani er broytt við Ll. nr. 168 frá 30. desember 1997).

Vísandi til s. 31-32 í grannskoðanartrágreiðingini viðvíkjandi álíkning kann nevnast, at § 104 síðani er broytt við Ll. nr. 168 frá 30. desember 1997.

Vísandi til umrøðuna á s. 32 av § 103, stk. 3 í skattalógini halda løgtingsgrannskoðararnir, at tað er sera óheppið, at ivi so leingi hevur verið um, hvussu ein tílík áseting skal tulkast. Løgtingsgrannskoðararnir átala, at Fíggjar- og Búskapardeildin ikki hevur svarað skrivum hesum viðvíkjandi. (Nevnast kann, at § 103, stk. 3 síðani er broytt við Ll. nr. 168 frá 30. desember 1997).

Viðvíkjandi avgjaldi frá Tryggingarsambandinum Føroyar átala løgtingsgrannskoðararnir, at tað tók so nógv ár at fáa greiðu á hesum máli.

Løgtingsgrannskoðararnir hava heft seg við, at á s. 37 verður ført fram, at nógvir teilir eru í innflutningsgjø-

unum, sum á fleiri økjum gera, at hagtølini als ikki eru eftirfarandi. Innanhýsis grannskoðanin á Toll- og Skattstovu Føroya hevur eisini í áravís víst á, at hagtølini ikki verða brøytt, um tollskrásetingarnar verða broyttar.

Vísandi til síðu 36-37 í grannskoðanarfrágreiðingini (3.7.2 Umsiting av reglum viðvíkjandi tollkreditti), átala løgtingsgrannskoðararnir, at Fíggjar- og Búskapardeildin ikki hevur latið við seg koma, hóast grannskoðanardeildin í áravís hevur mint á, at fleiri reglur í kunngerðini ikki verða bildnar.

Løgtingsgrannskoðararnir átala, at Fíggjar- og Búskapardeildin á fleiri øðrum økjum heldur ikki hevur svarað viðmerkingum og fyrispurningum frá grannskoðanardeildini m.a. viðvíkjandi brennioljugjaldi/lógarheimild at kanna roknskapartilfar, endurrindan av brennioljugjaldi til gistingarhús, kanning av tollrokningum, lønarhæddaravgjaldi, skrásetingargjaldi og ferðagjaldi/lógarheimild at kanna roknskapartilfar og viðvíkjandi eftirliti við, at lógir verða bildnar.

Á s. 39-41 er umsitingin av Trygdargrunninum fyri avreiðingar og lønir umrødd. Víst verður m.a. á, at arbeiðsgongdir og innanhýsis eftirlit ikki hava verið nóg góð. Hetta hevur ført við sær, at starvsfólkini, sum umsita grunnin, ikki hava verið greið yvir, hvussu málini skuldu avgreiðast, og hvussu viðgerðin skuldi skjalprógvast. Á útgjaldingarøkinum kom hetta til sjóndar t.d. við, at goldið er út, uttan at krøvini í lóg og kunngerð eru fylgd, at miðkrøv ikki eru skrásett og fráboðað, og í fleiri førum var ikki gjørligt at siggja, hvussu eitt mál var viðgjørt. Løgtingsgrannskoðararnir átala hesi viðurskifti, men fegnast um, at stig eru tikin til at bøta um hesi.

Vísandi til s. 41-43 hava løgtingsgrannskoðararnir heft seg við, at roknskapir fyri Arbeiðsmarknaðareftirlønargrunnin og Frítíðargrunnin ikki eru gjørdir í fleiri ár, men at hesi viðurskifti eru við at koma í rættlag.

8.3 Løgmansfyrisitingin

Vísandi til tað, sum verður ført fram á s. 44-45 í grannskoðanarfrágreiðingini viðvíkjandi eftirliti við Framtaksgrunninum, mæla løgtingsgrannskoðararnir til, at landsstýrið greiðir teir ivaspurningar, sum Grannskoðanardeild Landskassans hevur reist hesum viðvíkjandi.

Løgtingsgrannskoðararnir átala, at landsstýrið onkantíð umskipaði grunnin til Menningarhjálp til ein eksternan grunn, bóast hetta varð álagt landsstýrinum sambært L.l. nr. 33 frá 27. mars 1992 um avtøku av landskassagrunnum. Grunnurin er síðani tikin av við L.l. nr. 94 frá 6. juni 1997.

8.4 Almanna- og Heilsumál

Viðvíkjandi umsiting av almannaøkinum verður á s. 59 í grannskoðanarfrágreiðining m.a. víst á, at á nógvum økjum innan almannaumsitingina av veitingum hevur tað víst seg at vera sera trupult og tíðarkrevjandi at fremja munandi og skilagóðar broytingar. Sostatt sigast somu trupulleikar hava verið umrøddir í frágreiðingunum ár um ár, og mett verður, tað neyvan tænir nøkrum endamáli framhaldandi at gera djúpføkna grannskoðan og altfinningarsamar grannskoðanarfrágreiðingar á viðskiftaøkinum fyri enn munandi ábøtur eru gjørdar. Talan er um eitt útreiðsluøki, har sjálvt smærri feilir kunnu hava stóran fíggjarligan týdning, og tað hevur, sum nevnt, víst seg at ganga seint at fremja broytingar á økinum. Grannskoðanardeildin hevur víst á, at tað er umráðandi, at stig verða tikin til neyðugar dagføringar av almannalóggávuni og samskipan við aðra lóggávu, hvørji umsitingarlig krøv skulu setast til málsviðgerð, eftirlit og roknskaparhald, og hvussu grannskoðanin av útreiðslunum á almannaøkinum við støðið í hesum skal skipast framyvir, og mælt verður til, at teir fíggjarligu karmarnir fyri hesum samstundis verða viðgjørdir.

Sum áður nevnt, vóna løgtingsgrannskoðararnir, at uppskot landsstýrisins um nýggja pensjónslóggávu fer at lætta og bøta um umsitingarligu trupulleikarnar á pensiónsøkinum. Løgtingsgrannskoðararnar hava heft seg við, at tað á s. 52 í grannskoðanarfrágreiðingini verður víst á, at tørvur er á eini nýggjari EDV-skipan á Almannastovuni, sum undir øllum umstøðum má vera liðug áðrenn ár 2000, orsakað av trupulleikum við árstølum í verandi skipan. Peningur er játtaður á fíggjarlógini til nýgerð av edv.

Løgtingsgrannskoðararnir hava gjøgnumgingið roknskapirnar og grannskoðanarprotokollirnar hjá teimum trimum sjúkrahúsunum fyri árini 1992-1995. Víst verður til s. 65-68 í hjáløgdu grannskoðanarfrágreiðing frá Grannskoðanardeild Landskassans. Á s. 67 er tikið samanum viðmerkingarnar frá roknskapargrannskoðanini fyri tey 3 sjúkrahúsini. Løgtingsgrannskoðararnir átala umroddu viðurskifti.

8.5 Útbúgving og gransking

Vísandi til tað, sum verður ført fram á s. 72-73 um útbúgvingarstuðul og lán, átala løgtingsgrannskoðararnir, at innkrevjingin av veittum lánum als ikki er nøktandi, og beita á landsstýrismannin um at fáa hesi viðurskifti í rættlag.

8.6 Landbúnaðarmál

Vísandi til s. 79-80 í grannskoðanarfrágreiðingini átala løgtingsgrannskoðararnir, at landsstýrið umskipaði Royndarstøðina í Kollafirði til »Almennar royndir og ráðgeving« uttan at áseta nærri reglur fyri virksemi stovnsins.

Vísandi til tað, sum verður ført fram á s. 80 í grannskoðanarfrágreiðingini um Búnaðardepilin í Kollafirði, átala løgtingsgrannskoðararnir, at hesin varð skipaður uttan neyðugar heimildir, og at landsstýrismaðurin ikki hevur greitt umroddu ivaspurningar.

Vísandi til tað, sum verður ført fram á s. 80-81 um Skógrøkt Landsins, mæla løgtingsgrannskoðararnir landsstýrismanninum til at fáa samsvar millum Ll. nr. 53 frá 27. november 1952 um viðalundir og tað virksemi, sum fer fram á Skógrøkt Landsins í dag.

Vísandi til tað, sum verður ført fram á s. 82-83 í grannskoðanarfrágreiðingini viðvíkjandi Djóralæknatænastuni og Fiskasjúkutænastuni, verður mælt landsstýrismanninum til at fáa greiðu á sáttmálaviðurskiftunum við støði í teimum spurningum, sum grannskoðanardeildin hevur sett.

8.7 Fiskivinnumál

Játtanin til Praktiskar fiskiroyndir er umrødd á s. 87-88 í grannskoðanarfrágreiðingini. Løgtingsgrannskoðararnir átala, at landsstýrið ikki hevur hildið reglugerðina um útgjaldingar úr landskassanum. Løgtingsgrannskoðararnir hava heft seg við, at fiskivinnuumsitingin metti, at stovnarnir, ið umsita játtanina, í fleiri førum ikki hava havt orku til at umsita tílíkar játtanir. Løgtingsgrannskoðararnir meta, at játtanin til fiskivinnuroyndir, sum í 1998 er komin uppá 9 mió.kr., er alt ov lítið útgreinað í viðmerkingunum.

Íløgustuðul til fiskivinnuna er umroddur á s. 89-91 í grannskoðanarfrágreiðingini. Viðvíkjandi umlegging av skuld til studningslán, hjá bátum yvir 20 brt., átala løgtingsgrannskoðararnir, at onki studningslán var tryggjað við veðrætti í skipunum, hóast hetta er ásett í § 6, stk. 3, í lógini. Løgtingsgrannskoðararnir átala, at landsstýrið ikki hevur svarað skrivi frá grannskoðanardeildini dagfest 14. juli 1995 viðvíkjandi gjøgnumgongd av einum máli í sambandi við yvirtøku av láni eftir § 7 í lógini.

Viðvíkjandi íløgustuðuli til bátar undir 20 brt. átala løgtingsgrannskoðararnir, at stuðul er goldin út í nøkrum málum, hóast allar treytir ikki tykjast vera loknar.

Á s. 91 í grannskoðanarfrágreiðingini er íløgustuðul til alivinnuna umroddur. Víst verður á, at ein treyt fyri stuðuli var, at umsøkjarin skuldi leggja eina rakstrar- og likviditetsætlan fyri landsstýrið. Løgtingsgrannskoðararnir undrast á, at umsitingin ikki viðgjørdi hesar rakstrar- og likviditetsætlanir og ikki gjørdi nakrar sjálvstøðugar metingar. Grannskoðanaradeildin metir, at fleiri umsóknir um íløgustuðul ikki áttu at verið játtaðar, tí »samanhangur« ikki var í rakstrinum. Veitti íløgustuðulin var tí í fleiri førum við til at útskjóta neyðugar umstruktureringar og umleggingar ístaðin fyri at elva til hesar.

Vísandi til umrøðuna av Trygdargrunni Alivinnunar á s. 91-92 í grannskoðanarfrágreiðingini halda løgtings-

grannskoðararnir tað vera óheppið, at grunnurin varð umskipaður til ein eksteman grunn av misgáum. Hesin er síðan tikin av aftur í 1997.

8.8 Vinnumál

Gistingarhúsgrunnurin er umskipaður til Grunn Ferðavinnunnar og hesin er umrøddur á s. 97-102 í grannskoðanarfrágreiðingini. Í frágreiðingini vísir grannskoðanardeildin m.a. á fleiri ógreið játtanarviðurskifti viðvíkjandi stuðli til ferðavinnuna og ímillum Grunn Ferðavinnunnar og Ferðaráð Føroya, og at hvørki stýrið fyri Ferðaráð Føroya ella stýrið fyri Grunn Ferðavinnunnar er nøgt við leiklutin hjá grunninum ella við samvinnuna ímillum grunnin og Ferðaráðið.

Løgtingsgrannskoðararnir mæla landsstýrismanninum til at fáa greiði á umrøddu viðurskiftum.

Grunnurin til fdnaðarfremjandi endamál er umrøddur í grannskoðanarfrágreiðingini á s. 93-97. Løgtingsgrannskoðararnir átala, at roknskapurin ikki vísir røttu fíggjarstøðuna/fíggjarorkuna hjá grunninum. Játtanarmannagongdin hevur verið ógreið, og løgtingsgrannskoðararnir átala, at landsstýrismaðurin í vinnumálum ikki hevur umskipað grunnin til eksteman grunn, sum álagt við L.l. nr. 33/1992.

Roknskaparviðurskiftini hjá Rúsdrekkasølu Landsins eru umrødd á s. 103-106 í grannskoðanarfrágreiðingini. Løgtingsgrannskoðararnir átala, at løgtingið ikki fekk høvi at taka støðu til ella geva tær neyðugu heimildirnar til tann fíggjarliga partin í sambandi við stovnsetan av Rúsdrekkasølu Landsins. Løgtingsgrannskoðararnir átala, at landsstýrið ikki hevur havt ein nóg virknan leiklut í sambandi við ásetan av søluprísum. Vísandi til tað, sum verður ført fram á s. 104, verður mælt landsstýrinum til at broyta játtanarmannagongdina, so bruttovinningurin verður ein játtan fyri seg (inntøkujáttan).

Løgtingsgrannskoðararnir átala, at reglurnar viðvíkjandi uttanlandsferðum ikki hava verið hildnar. Løgtingsgrannskoðararnir hava heft seg við, at skrásetingin av sølu og peningi ikki hevur verið í einari tryggari legu, síðani edv-skipanin varð broytt.

8.9 Samferðslu- og samskiftismál

Vísandi til tað, sum verður ført fram á s. 109 í grannskoðanarfrágreiðingin viðvíkjandi Bileftirliti Føroya, mæla løgtingsgrannskoðararnir landsstýrinum til at greiða heimildarspurningin viðvíkjandi ásetan av gjøldum.

Viðvíkjandi Strandfaraskipum landsins átala løgtingsgrannskoðararnir, at landsstýrismaðurin ikki hevur svarað skrivum viðvíkjandi játtanini í 1995 og viðvíkjandi roknskapunum fyri 1993 og 1994.

Somuleiðis átala løgtingsgrannskoðararnir, at landsstýrismaðurin ikki hevur svarað skrivið frá løgtingsgrannskoðarunum dagfest 21. oktober 1996 viðvíkjandi sølu av »Teistanum«. Løgtingsgrannskoðararnir halda, at tað er sera óheppið, at ein landsstýrismaður ikki svarar tílíkum skrivum. Vísandi til tað, sum verður ført fram á s. 107-109 í grannskoðanarfrágreiðingini, taka løgtingsgrannskoðararnir undir við sjónarmiðunum hjá Grannskoðanardeild Landskassans og Fíggjar- og Búskapardeildini um, at søla av aktivum, sum útgangsstøði, krevur fíggjarheimild frá løgtinginum. Undantikið hesum er tó søla, sum natúrliga hongur saman við dagliga rakstrinum.

Skjal 1.

Yvirlit yvir játtanar- og roknskapartøl 1992

(mió.kr.)

		FLóg	Fyka-F.-lóg	Munur	Roknsk.	Fyka-F.-lóg	Munur
	INNTØKUR						
§ 1	Inntøkuskattur	1.090	900	190	**916**	900	16
§ 2	Toll-, nýtslu og framleiðslugjøld	831	760	71	**744**	760	-16
§ 3	Onnur gjøld	2	4	-2	**5**	4	1
§ 4	Inntøkur av spæli	1	1	0	**1**	1	0
§ 5	Rentuinntøkur	-163	58	-221	**35**	58	-23
§ 6	Landsfyritøkur	20	0	20	**0**	0	0
§ 7	Partur av avlopi Tjóðbankans	20	20	0	**31**	20	11
§ 8	Gjøld frá danska ríkiskassanum	789	802	-13	**795**	802	-7
§ 9	Ymsar inntøkur	2	2	0	1	2	-1
	Samantaldar inntøkur	2.592	2547	45	**2.528**	2547	-19
	ÚTREIÐSLUR						
§ 10	Løgtingið	16	17	-1	**17**	17	0
§ 11	Meginfyrisitingin	150	153	-3	**148**	153	-5
	Uttanríkismál	5	3	2	**3**	3	0
§ 12	Heilsumál	375	392	-16	**393**	392	1
§ 13	Samferðsla og samskifti	328	378	-50	**399**	378	21
§ 14	Útbúgving og gransking	394	388	6	**392**	388	4
§ 15	Mentan	59	56	3	**55**	56	-1
§ 16	Fiskivinna, sigling o.t.	334	320	13	**315**	320	-5
§ 17	Landbúnaður	36	34	2	**34**	34	0
§ 18	Vinnulív og arbeidsmarknaður	84	414	330	**428**	414	14
§ 19	Almannamál v.m.	776	791	-15	**789**	791	-2
	Íbúðarmál	13	8	5	**7**	8	-1
§ 20	Eftirlønarútreiðslur	12	12	0	**12**	12	0
§ 21	Effektivar veðhaldsbindingar	80	226	-146	**189**	226	-37
§ 22	Rentuútreiðslur	6	257	-251	**257**	257	0
§ 26	Ymsar ognarútreiðslur	1	0	1	**0**	0	0
§ 27	Óvissar útreiðslur	14	0	14	**0**	0	0
§ 28	Serligar útreiðslur	0	0	0	**0**	0	0
	Samantaldar útreiðslur	2.683	3.449	-766	**3438**	3.449	-11
	Rakstrar- og fløgumundirskot	-91	-903	811	**-909**	-903	-6
	Nettoútlán landskassans	3	23	-20	**8**	23	-15
	Rakstrar-, fløgu- og útlánsundirskot	-88	-880	792	**-901**	-880	-22

Skjal 2.

Yvirlit yvir játtanar- og roknskapartøl 1993

(mió.kr.)

		Fíggjarlóg	Fyrisitingarlig fíggjarlóg	Munur	Roknskapur	Fyrisitingarlig fíggjarlóg	Munur
	INNTØKUR:						
§ 1	Inntøkuskattur	888	814	74	**858**	814	44
§ 2	Toll-, nýfslu- og framleiðslugjøld	888	753	135	**730**	753	-23
§ 3	Onnur gjøld	13	4	9	**4**	4	0
§ 4	Inntøkur av spæli	1	0	1	**1**	0	1
§ 5	Rentuinntøkur	65	40	25	**51**	40	11
§ 6	Landsfyritøkur	13	13	0	**15**	13	2
§ 7	Partur av avlopi Tjóðbankans	25	30	-5	**44**	30	14
§ 8	Gjøld frá danska ríkiskassanum	807	804	3	**814**	804	10
§ 9	Ymsar inntøkur	1	1	0	**1**	1	0
	Samantaldar inntøkur	2.701	2459	242	**2518**	2459	59
	ÚTREIÐSLUR						
§ 10	Løgtingið	15	15	0	**15**	15	0
§ 11	Meginfyrisitingin	130	135	-5	**133**	135	-2
	Uttanríkismál	2	2	0	**2**	2	0
§ 12	Heilsumál	347	356	-9	**357**	356	1
§ 13	Samferðsla og samskifti	192	203	-11	**206**	203	3
§ 14	Útbúgving og gransking	355	366	-11	**366**	366	0
§ 15	Mentan	52	52	0	**51**	52	-1
§ 16	Fiskivinna, sigling o.t.	143	154	-11	**156**	154	2
§ 17	Landbúnaður	29	29	0	**29**	29	0
§ 18	Vinnulív og arbeiðsmarknaður	74	56	18	**43**	56	-13
§ 19	Almannamál v.m.	826	833	-7	**837**	833	4
	Íbúðarmál	7	7	0	**7**	7	0
§ 20	Eftirlønarútreiðslur	11	11	0	**11**	11	0
§ 21	Effektivar veðhaldsbindingar	150	210	-60	**202**	210	-8
§ 22	Rentuútreiðslur	318	317	1	**326**	317	9
§ 26	Ymsar ognarútreiðslur	1	1	0	**0**	1	-1
§ 27	Óvissar útreiðslur	20	20	0	**20**	20	0
§ 28	Serligar útreiðslur	0	2.290	-2.290	**2.290**	2.290	0
	Samantaldar útreiðslur	2672	5.057	-2.385	**5.051**	5.057	-6
				0			
	Rakstrar- og fløguundirskot	29	-2.597	2.626	**-2.532**	-2.597	65
	Nettoútlán landskassans	0	0	0	**-2**	0	-2
	Rakstrar-, fløgu- og útlánsundirskot	29	-2.597	2.626	**-2.534**	-2.596	63

Skjal 3.

Yvirlit yvir játtanar- og roknskapartøl 1994

(mió.kr.)

		Fløg	Eyka-F.-lóg	Munur	Roknsk.	Eyka-F.-lóg	Munur
	INNTØKUR:						
§ 1	Inntøkuskattur	763	765	-2	**788**	765	23
§ 2	Toll-, nýtslu- og framleiðslugjøld	918	923	-5	**947**	923	24
§ 3	Onnur gjøld	16	6	10	**3**	6	-3
§ 4	Inntøkur av spæli	1	1	0	1	1	0
§ 5	Rentuinntøkur	40	40	0	**29**	40	-11
§ 6	Landsfyritøkur	13	12	1	**13**	12	1
§ 7	Partur av avlopi Tjóðbankans	25	0	25	**0**	0	0
§ 8	Gjøld frá danska ríkiskassanum	810	808	2	**817**	808	9
§ 9	Ymsar inntøkur	1	1	0	**1**	1	0
	Samantaldar inntøkur	2.587	2556	31	**2.599**	2556	43
	ÚTREIÐSLUR						
§ 10	Løgtingið	16	17	-1	**17**	17	0
§ 11	Meginfyrisitingin	137	142	-5	**140**	142	-2
	Uttanríkismál	2	2	0	**2**	2	0
§ 12	Heilsumál	358	365	-7	**366**	365	1
§ 13	Samferðsla og samskifti	159	181	-22	**181**	181	0
§ 14	Útbúgving og gransking	364	372	-8	**367**	372	-5
§ 15	Mentan	45	49	-4	**48**	49	-1
§ 16	Fiskivinna, sigling o.t.	123	157	-34	**155**	157	-2
§ 17	Landbúnaður	25	25	0	**25**	25	0
§ 18	Vinnulív og arbeiðsmarknaður	84	75	9	**72**	75	-3
§ 19	Almannamál v.m.	862	840	22	**839**	840	-1
	Íbúðarmál	12	27	-15	**26**	27	-1
§ 20	Eftirlønarútreiðslur	12	12	0	**11**	12	-1
§ 21	Effektivar veðhaldsbindingar	90	65	25	**66**	65	1
§ 22	Rentuútreiðslur	553	437	116	**440**	437	3
§ 26	Ymsar ognarútreiðslur	6	1	5	**0**	1	-1
§ 27	Óvissar útreiðslur	0	0	0	**0**	0	0
§ 28	Serligar útreiðslur	0	251	-251	**234**	251	17
	Samantaldar útreiðslur	2.848	3018	-170	**2989**	3018	-29
	Rakstrar- og fløgumdirskot	-261	-462	201	**-391**	-462	71
	Nettoútlán landskassans	3	3	0	**0**	3	3
	Rakstrar-, fløgu- og útlánsundirskot	-258	-459	201	**-391**	-459	68

1. viðgerð týsdagin 17. mars 1998. Uppskotið varð uttan nevndarviðgerð beint beinleiðis til 2. viðgerð.

Málið fall burtur sbr. stýrisskipanarlógini § 15 stk. 3, tí at løgtingsval var 30. apríl 1998, og málið ikki var liðugt viðgjørt á tingi fyri valið.

77-12 Grannskoðan av almennum roknskapum

Ár 1998, hósdagin 5. mars, legði Atli Hansen, løgtingsmaður, vegna løgtingsgrannskoðarunar fram soljóðandi:

Uppskot
til
samtyktar

Vísandi til niðanfyristandandi frágreiðing samtykkir Løgtingið at góðkenna roknskapirnar hjá **Húsaláusgrunninum** fyri fíggjarárini **1993-1996.**

Frágreiðing frá løgtingsgrannskoðarunum:

1. Lógargrundarlag:
Húsalánsgrunnurin er undir eftirliti landsstýrisins og virkaði í tíðarskeiðnum 1993-1996 eftir:
- Løgtingslóg nr. 97 frá 1. november 1978 um Húsalánsgrunn við broytingum í Ll. nr. 65 frá 11. mai 1982, Ll. nr. 44 frá 2. mai 1986, Ll. nr. 32 frá 7. mai 1991 og Ll. nr. 93 frá juni 1995.
- Kunngerð nr. 68 frá 26. juni 1991, broytt við kunngerð nr. 27 frá 14. februar 1995.

Við Ll. nr. 118 frá 18.6.1997 kom nýggj lóg um Húsalánsgrunnin o.a. í gildi.

2. Endamál:
Húsalánsgrunnurin hevur til endamáls at veita lán til sethúsa- og íbúðabygging og keyp.

Húsalánsgrunnurin kann sambært § 7 veita hesi lán:

1. Stuttfreistað lán til keyp av grundstykki.
2. Byggilán til bygging av nýggjum sethúsum og íbúðum, avmarkað til ta upphædd, ið grunnurin veitir sum veðskuldarlán.
3. Veðskuldarlán til nýggj sethús og íbúðir.
4. Veðskuldarlán til keyp av sethúsum ella íbúðum.
5. Veðskuldarlán til endurnýggingar, umbyggingar og bjálving av sethúsum og íbúðum.

Lániumsóknir skulu vera skrivligar, og við umsóknini skulu fylgja húsateking, kostnaðarætlan, og eisini skal tilskilast, um lánið ynskist sum annuitetslán ella seriulán.

3. Fíggjarviðurskifti:
Inntøkurnar hjá Húsalánsgrunninum eru rentuinntøkur av veittum lánum.

Harumframt er peningur játtaður Húsalánsgrunninum á fíggjarlógini.

Niðanfyri er sett upp, hvussu nógv er játtað á fíggjarløgtingslógini 1991-1996:

(mió.kr.)

	1991	1992	1993	1994	1995	1996	Alt
Játtað á § 19 á fíggjarlógini	0	5,0	5,0	10,0	0	0	20,0
Játtað á § 21 á fíggjarlógini	0	0	0	15,0	0	0	15,0
Eftirgivið lán úr Oljugrunninum	0	0	57,5	0	0	0	57,5

Við heimild løgtingslóg nr. 28/1995 um lán til Húsalánsgrunnin, hevur grunnurin í 1995 lænt 50 mió.kr. úr Landsbankanum.

4. Ársroknskapur:
Ársroknskapurin skal verða grannskoðaður av løggildum grannskoðara. Ársroknskapurin verður sendur landsstýrinum við frágreiðing og viðmerkingum frá stýrinum. Ársroknskapurin verður lagdur fyri løgtingið til góðkenningar.

Til tess at kunna løgtingið um ta fíggjarligu gongdina, er gjørdur ein samandráttur av ársroknskapunum fyri 1993-1996, og til samanberingar eru roknskapartølini fyri 1991-1992 tikin við.

5. Yvirlit yvir gongdina í rakstrinum 1991-1996:

(mió.kr.)

	1996	1995	1994	1993	1992	1991
Rentuinntøkur av útlánum	45,5	54,5	60,2	82,3	73,5	67,7
Rentuútreiðslur og kurstap	-25,9	-36,5	-42,1	61,9	-57,2	-50,9
	19,6	18,0	18,1	20,4	16,3	16,8
Rakstrarútreiðslur	-5,6	-6,1	-6,2	-5,4	-6,4	-6,1
Av- og niðurskrivingar av fastogn	-0,8	-0,6	-0,7	-4,8	-9,2	-1,5
Avskriv.og avset.móti tapi	7,6	8,7	26,0	-168,8	-141,0	-8,6
Rakstrarúrslit	40,4	38,0	3,3	-138,2	-124	17,4

6. Yvirlit yvir gongdina í fíggjarstøðuni 1991-1996:

(mió.kr.)

Aktiv	1996	1995	1994	1993	1992	1991
Veðbrøv, útlán	599,7	700,2	778,4	680,1	864,2	778,6
- avsett móti tapi	-228,7	-245,9	-283,3	-138,0	-135,0	-6,0
	371,0	454,3	495,1	542,1	729,2	772,6
Tøkur peningur	109,8	52,6	31,7	27,8	30,7	3,1
Onnur skuld	40,5	52,0	51,3	55,9	43,9	39,9
Aktiv í alt	521,3	558,9	578,1	625,8	803,8	815,6
Passiv						
Lán innanlands	124,7	134,7	113,5	123,4	188,5	200,5
Lán uttanlands	233,6	284,3	340,3	386,2	405,7	275,5
Onnur skuld	18,4	23,5	26,9	29,3	20,7	20,0
	376,7	442,5	480,7	538,9	614,9	496,0
Eginogn:						
Eginogn við ársbyrjan	116,4	97,4	86,9	188,9	319,6	318,4
Játtan á fíggjarlóg	0,0	0,0	25,0	5,0	5,0	0,0
Eftirgivið lán úr Oljugrunninum	0,0	0,0	0,0	57,5	0,0	0,0
Rakstrarúrslit	20,8	20,1	-14,7	-158,6	-140,3	0,6
Regulering mat.nr. 1315	0,0	0,0	0,0	1,2	0,0	0,0
Ikki ásannaður kursmunur	7,4	-1,0	0,1	-7,1	-4,6	0,6
Eginogn við ársenda	144,6	116,4	97,4	86,9	188,9	319,6
Passiv í alt	521,3	558,9	578,1	625,8	803,8	815,6

7. Seinasta álit løgtingsgrannskoðarunna:
Í seinasta álitinum løgtingsgrannskoðarunna, dagf. 16. februar 1994, viðvíkjandi roknskapunum fyri árini 1986-1992, varð víst á, at Íbúðargrunnurin var avtikin sambæri løgtingslóg nr. 33. frá 27. mars 1992 um avtøkur av landskassagrunnum. Men løgtingslóg nr. 52. frá 27. mei 1987 um Íbúðargrunn. hevur m.a. ásett er, at

Íbúðargrunnurin er sjálvsognarstovnur, var ikki avtikin. Heitt varð tí á landsstýrið um at greiða henda spurning. Hesi viðurskifti eru síðani komin í rættlag, við tað at Íbúðargrunnurin er endurstovnaður.

8. Viðmerkingar:
Løgtingsgrannskoðararnir hava gjøgnumgingið ársroknskapirnar og grannskoðanarprotokollirnar, til tess at vissa seg um, at rætt er farið fram bókhaldsliga og roknskaparliga hjá grunninum.

Roknskapargrannskoðanin hevur víst á, at grunnurin í fleiri førum ikki hevur sett fram krøv móti gomlu eigarunum, tá hús eru seld á tvingsilssølu, og grunnurin ikki hevur fingið fulnað fyri veitt lán. Hesi viðurskifti eru síðani komin í rættlag.

Roknskapargrannskoðanin vísir á, at tað er neyðugt, at skipaðir framferðarhættir verða nýttir, tá metingar skulu gerast av, um grunnurin skal keypa hús á tvingsilssølu, og mælir til at gera eina skrivliga mannagongd hesum viðvíkjandi.

Roknskapargrannskoðanin hevur eisini víst á, at skrivligar reglur og mannagongdir hava vanta á á so at sirga øllum økjum, frá tí at ein umsókn kemur til grunnin og til eitt lán verður útgoldið, og hevur mælt stýrinum til at áseta nærri reglur hesum viðvíkjandi. Upplýst er, at uppskot til slíkar reglur eru til viðgerðar í grunninum.

Roknskapargrannskoðanin hevur eisini mælt til, at ein fíggjarleiðari verður settur at hava ábyrgd fyri bókhaldinum, umsiting av lánum, uppsetan av roknskapi, fíggjarætlanum v.m.

Vísandi til viðmerkingarnar frá roknskapargrannskoðanini hevur landsstýrismaðurin spurt stýrið um, hvørji tiltøk eru sett í verk fyri at betra um viðurskiftini. Stýrið hevur síðani latið landsstýrismanninum eina frágreiðing um hetta, sum hann hevur tikið til eftirtektar.

1. viðgerð týsdagin 17. mars 1998. Uppskotið verður uttan nevndarviðgerð beint beinleiðis til 2. viðgerð.

Málið fall burtur sbr. stýrisskipanarlógini § 15 stk. 3, tí at løgtingsval var 30. apríl 1998, og málið ikki var liðugt viðgjørt á tingi fyri valið.

78 Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um granskingarráð Føroya

Ár 1998, hósdagin 5. mars, legði Eilif Samuelsen, landsstýrismaður, vegna Føroya landsstýri fram soljóðandi

Uppskot
til
løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um granskingarráð Føroya

§ 1.

Í løgtingslóg nr. 56 frá 20. mai 1996 verður gjørd henda broyting:
§ 3, stk. 3 verður orðað soleiðis:
»*Stk. 3.* Formaðurin og limirnir í ráðnum verða tilnevndir fyri fýra ár, og kunnu ikki sita í ráðnum longri enn 2 skeið í senn. Fer limur út ráðnum, verður nýggjur limur tilnevndur fyri restina av skeiðnum.«

§ 2.

Henda lóg kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.
Stk. 2. Tilnevning av formanni og limum í granskingarráðið sambært hesi lógarbroyting verður fyrstu ferð 1. apríl 2000.

Viðmerkingar
Sambært galdandi lóg um granskingarráð, skal landsstýrismaðurin tilnevna 7 limir í ráðið, harav ein teirra skal vera tilnevndur formaður. Tað ráðið, sum nú situr, er tilnevnt við skrivi landsstýrismansins frá 22. august 1996.

Av tí at setanarskeiðið hjá ráðnum ikki er tíðaravmarkað, skjýtur landsstýrismaðurin upp at broyta § 3, stk. 3 í lógini soleiðis, at setanarskeiðið hjá ráðnum verður sett til 4 ár, og at nýggjur limur kann tilnevnast fyri restina av skeiðnum, um so er, at limur fer frá. Somuleiðis verður skotið upp, at tilnevning av granskingarráði sambært hesi lógarbroyting skal fara fram 1. apríl 2000.
+ skjal.

1. viðgerð hósdagin 12. mars 1998. Uppskotið varð beint í mentanarnevndina.

Málið fall burtur sbr. stýrisskipanarlógini § 15 stk. 3, tí at løgtingsval var 30. apríl 1998, og málið ikki var lidugt viðgjørt á tingi fyri valið.

F.L.ja.nr. 301-15/95

79 Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um kapping

Ár 1998, hósdagin 5. mars, legði Eilif Samuelsen, landsstýrismaðurvegna Ivan Johannesen, landsstýrismann, vegna landsstýrið fram soljóðandi

Uppskot
til
løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um kapping

§ 1.

Í løgtingslóg nr. 83 frá 6. juni 1997 um kapping verður gjørd hendan broyting:
§ 15 verður orðað soleiðis:
»§ 15. Kærunevndin fyri kappingarmál er sett saman av tí ikki fyrisitandi sorinskrivaranum sum formanni og tveimum øðrum limum settum av landsstýrismanninum. Fyri hvønn av limunum velur landsstýrismaðurin varalimir. Limirnir valdir av landsstýrismanninum skulu vera óheftir av viðmerkingum áhugamálum.
Stk. 2. Landsstýrismaðurin ger nærri reglur um virksemi og samsyning nevndarinnar.«

§ 2.

Henda lóg kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

Viðmerkingar
Tann 1. august 1997 varð løgtingslóg um kapping sett í gildi. Í hesum sambandi skuldi ein kærunevnd veljast, har kærur viðvíkjandi avgerðum, tiknum av kappingarráðnum, kundu kærast, og hvørs avgerðir kundu leggjast fyri Føroya Rætt.

Í verandi lóg um kupping er ásett:

»**§ 15.** *Í kærunevndini fyri kappingarmál eru ein formaður og 2 aðrir limir settir av landsstýrismanninum eftir tilmæli frá Føroya Rætti. Fyri hvønn av limunum verða valdir varalimir. Formaður skal vera løgfrøðingur, og formaður og limirnir skulu vera óheftir av vinnuligum áhugamálum.*

Skt. 2. Landsstýrismaðurin ger nærri reglur um virksemi og samsýning nevndarinnar.«

Í viðmerkingunum til hesa grein stendur: *»Í kærunevndini sita 3 limir sum verða útnevndir av landsstýrismanninum eftir tilmæli frá Føroya Rætti. Limirnir mugu vera óheftir av vinnuligum áhugamálum, men tað er sjálvandi ein fyrimunur, um teir samstundis hava vitan um kappingarviðurskifti. Einki er ásett í sjálvari lógini um virksemi nevndarinnar, hvørki viðvíkjandi valskeiði, men heimild er hjá landsstýrismanninum eftir stk. 2 í kunngerð at ásetа slíkar.«*

Føroya Rættur vendi sær til Vinnumálastýrið í november 1997 og vísti á, at ásetingin var óheppin, tí hon gongur út frá, at Føroya Rættur hevur vitan um vinnuligt virksemi. Rætturin setti seg ikki fatan fyri at gera eitt tillíkt tilmæli. Rætturin heitti tí á Vinnumálastýrið um at fremja broyting í lógini, soleiðis at rætturin varð fritikin fyri at gera eitt tilmæli.

Samstundis er neyðugt við einari óheftari kærunevnd innan kappingarmál, og tí verður skotið upp at broyta lógina soleiðis, at formaðurin er tann ikki fyrisitandi sorinskrivarin, men at landsstýrismaðurin velur hinar limirnar. Tann ikki fyrisitandi sorinskrivarin verður føddur limur, tí tann fyrisitandi kann koma í gegnts trupulleikar um hann tekur sæti sum føddur limur.

Lógarbroytingin er gjørd í samráð við Føroya Rætt, danska løgmálaráðið og forsetan fyri Eystara Landsrætt.

Fíggjarligur kostnaður av uppskotinum er ongin mótvegis verandi ásetingum í § 15 í løgtingslóg um kapping. Nevndin fær samsýning fyri arbeiði sítt, og er játtanin á fíggjarlógini fyri 1998 til Kappingarráðið 1,5 mió. kr., og er her íroknað samsýning til kærunevndina.

Kappingarráðið varð valt síðst í august 1997 og 19. september varð kunngerð nr. 141 lýst fyri virksemið ráðsins. Ráðið hevur enn ikki tikið veruligar avgerðir, og hevur arbeiðið ráðsins fram til nú fyri tað mesta verið at leggja virksemi til rættis. Skrivstova ráðsins er fjarskiftiseftirlitið, og ætlar fjarskiftiseftirlitið at seta fólk at taka sær av kappingarlógini.

1. viðgerð fríggjadagin 13. mars 1998. Uppskotið varð beint í vinnunevndina.

Málið fall burtur sbr. stýrisskipanarlógini § 15 stk. 3, tí at løgtingsval var 30. apríl 1998, og málið ikki var liðugt viðgjørt á tingi fyri valið.

F.L. j.nr. 1104-8/97

80 Góðkenning av norðurlendskum sáttmála um atgongd til víðari útbúgvingar

Ár 1998, hósdagin 5. mars, legði Eilif Samuelsen, landsstýrismaður, vegna Føroya landsstýri fram soljóðandi

Uppskot
til
samtyktar

Løgtingið góðkennir, at landsstýrið mælir ríkismyndugleikunum til at seta í gildi fyri Føroyar norðurlendska sáttmálan um atgongd til víðari útbúgvingar.

Viðmerkingar
Við skrivi dagfest 24. mars 1997, hevur ríkisumboðsmaðurin sent landsstýrinum fyrispurning frá danska undirvísingarmálaráðnum, har spurt verður um norðurlendski sáttmálin um atgongd til víðari útbúgving (Nordisk overenskomst om adgang til videregående uddannelse) skal galda fyri Føroyar.

Sáttmálin sum er millum Danmark, Finnland, Ísland, Noreg og Svøriki kom í gildi 1. januar 1997 og skal virka sum ein fyribilsskipan í 3 ár.

Sambært grein 10. stk. 3, kann sáttmálin setast í gildi fyri Føroyar. Sáttmálin ásetir m.a., at partanir sín ámillum binda seg til at geva teimum sum nema sær útbúgving, sum hava fastan bústað í einum norðurlandi, atgongd til almennar víðari útbúgvingar undir somu treytum sum landsins egnu borgarar. Londini sum taka inn lesandi úr einum norðurlandi fáa eitt ávíst gjald frá tí norðurlandi hin lesandi kemur úr.

Ísland, Føroyar, Grønland og Áland sleppa tó undan gjaldinum.

Áðrenn sáttmálin kom í gildi, var skipanin tann, at tað var ókeypis hjá borgara í einum norðurlandi at nema sær víðari útbúgving í einum øðrum norðurlandi. Tó hevdu londini sett kvotur fyri talið á lesandi sum komu úr Norðurlondum.

Sáttmálin hevur ongar fíggjarligar avleiðingar fyri landskassan.

Ongin tørvur er á fylgilóggávu um sáttmálin verður settur í gildi fyri Føroyar

Við hesum verður málið við fylgiskjølum lagt fyri løgtingið.
+ skjøl.

Landsstyrets j.nr. 2150-15/93 - Nordisk overenskomst om adgang til videregående uddannelse

Vedlagt fremsendes kopi af Undervisningsministeriets skrivelse af 13. januar 1997 om nordisk Overenskomst om adgang til videregående Uddannelse, idet det bedes oplyst om overenskomsten skal have gyldighed for Færøerne.

Venlig hilsen. Kaj Jensen, fuldmægtig

25.mar. 1997
FL.nr. 2150-15/93

Ikrafttrædelse af nordisk Overenskomst om adgang til videregående Uddannelse.

Ifølg overenskomstens artikel 10 træder den først i kraft for Færøerne tredive dage efter at Danmarks regering har underrettet det finske udenrigsministerium om, at Færøernes Landsstyre har meddelt, at den skal have gyldighed for Færøerne, jf. vedlagte kopi af overenskomsten.

I denne anledning anmodes Rigsombudet om at søge afklaret, om overenskomsten skal have gyldighed for Færøerne.

Kopi af Udenrigsministeriets verbalnote af 3. december 1996 vedlægges til orientering.

Med venlig hilsen, Niels Heyn Christiansen

Overenskomst

mellem Danmark, Finland, Island, Norge og Sverige om adgang til videregående uddannelse

Regeringerne i Danmark, Finland, Island, Norge og Sverige, nedenfor kaldet parterne,

som i henhold til artikel 3, litra e og g, i aftale af 15. marts 1971 mellem Danmark, Finland, Island, Norge og Sverige om kulturelt samarbejde vil

- øge mulighederne for, at studerende og andre hjemmehørende i et nordisk land kan uddanne sig og aflægge eksaminer ved de øvrige nordiske landes uddannelsesinstitutioner,

- etablere gensidig anerkendelse af eksaminer, deleksaminer og andre præstationsbeskrivelser,

som lægger vægt på Nordisk Ministerråds beslutning af 12. juni 1975 om nordisk tentamensgyldighed,

som henviser til Nordisk Ministerråds samarbejdsprogram af 27. marts 1991 for højere uddannelse i Norden,

som den 4. marts 1992 har indgået en overenskomst om nordisk uddannelsefælleskab på det gymnasiale niveau,

som er enige om yderligere at uddybe det nordiske samarbejde inden for videregående uddannelse med henblik på at skabe den størst mulige valgfrihed for uddannelsessøgende fra hele Norden og at fremme kvaliteten i de videregående uddannelser i Norden,

er blevet enige om følgende:

Artikel 1

Parterne forpliger sig gensidigt til at give uddannelsessøgende, som har fast bopæl i et andet nordisk land, adgang til deres offentlige, videregående uddannelser på samme eller tilsvarende vilkår som landets egne ansøgere. En uddannelsessøgende, som er berettiget til at søge optagelse ved de videregående uddannelser i det land, hvor den pågældende har fast bopæl, er også berettiget til at søge optagelse ved videregående uddannelser i de andre nordiske lande. Parterne forpligter sig videre til på bedste måde at virke for, at noget tilsvarende finder anvendelse ved offentligt anerkendte videregående uddannelser, der udbydes af private, offentligt finansierede uddannelsesinstitutioner.

Ved videregående uddannelse forstås i denne overenskomst

i Danmark: Uddannelser ved institutioner for videregående uddannelse og videregående uddannelser ved andre uddannelsesinstitutioner, som forudsætter gymnasial uddannelse eller tilsvarende kvalifikationer;

i Finland: Uddannelse ved universiteter, højere læreanstalter og erhvervshøjskoler samt tilsvarende uddannelse som bygger på studentereksamen eller anden uddannelse, som giver studiekompentence;

i Island: Alle uddannelser, der bygger på studentereksamen eller ligeværdige kvalifikationer;

i Norge: Uddannelse ved universiteter og højere læreanstalter eller tilsvarende, som bygger på en gymnasial, godkendt videregående faglig eller tilsvarende studiekompetencegivende uddannelse;

i Sverige: Uddannelser ved universiteter og højere læreanstalter eller tilsvarende, som bygger på nationale

programmer i gymnasieskolen eller tilsvarende kvalifikationer, og som er omfattet af bekendtgørelsen om de videregående uddannelser (høgskoleforordningen).

Overenskomsten gælder ikke adgang til forskeruddannelse.

Artikel 2

Bestemmelserne i denne overenskomst indebærer ikke nogen undtagelse fra de regler om opholdstilladelse, som gælder i de respektive lande.

Bestemmelserne i denne overenskomst udgør ingen hindring for bilaterale aftaler mellem parterne om køb eller lignende af studiepladser inden for særlige uddannelser.

Artikel 3

Hvis der stilles krav om særlige kvalifikationer eller faglige kundskaber for at blive optaget på en bestemt videregående uddannelse, skal uddannelsessøgende fra de nordiske lande opfylde disse krav på vilkår, der svarer til dem for landets egne ansøgere.

Artikel 4

Hvis adgangen til videregående uddannelse er begrænset, udvælges ansøgere fra de andre nordiske lande efter samme eller tilsvarende regler som landets egne ansøgere. Man skal derved bestræbe sig på at benytte optagelsesregler, der så vidt muligt ligestiller uddannelsesøgende fra de andre nordiske lande med landets egne ansøgere.

Artikel 5

Parterne er enige om, at en uddannelsessøgende, der har gennemgået en del af sin videregående uddannelse med godkendt resultat hos en af parterne, skal kunne få denne del godskrevet ved en tilsvarende uddannelse hos en anden part. Merivurderingen foretages af den uddannelsesinstitution, ved hvilken godskrivning ønskes.

Artikel 6

Parterne skal sørge for at informere om uddannelsesmulighederne ved de forskellige institutioner for videregående uddannelse i Norden.

Artikel 7

Danmark, Finland, Norge og Sverige betaler hvert kalenderår en godtgørelse til studielandet for deres studerende i et andet nordisk land.

Island er undtaget fra denne bestemmelse.

Nordisk Ministerråd godkender størrelsen af den godtgørelse, hvert af de fire lande skal betale.

For de videregående uddannelser i et andet nordisk land, der er omfattet af Artikel 1, betales for 75 procent af det antal studerende, der får studiestøtte fra det land, hvor vedkommende har fast bopæl, og efter dette lands regler. Den årlige godtgørelse pr. studerende er DKK 22.000.

Betalingen mellem landene afregnes i form af en formindskelse eller forøgelse af disse landes andel af det årlige budget for det nordiske samarbejde.

Artikel 8

Som grundlag for beregningen af antal studerende anvendes statistiske oplysninger, som de nordiske myndigheder for studiestøtte årligt udarbejder for Nordisk Ministerråd. Studerende til og fra Færøerne, Grønland og Åland skal ikke indgå i beregningerne. Det samme gælder studerende inden for forskeruddannelse, studerende omfattet af Artikel 2, andet afsnit, samt studerende omfattet af Nordisk Program for Lærere, Uddannelsessøgende og Studerende (NORDPLUS) eller andet tilsvarende udvekslingsprogram.

For det kalenderår, hvor aftalen træder i kraft, beregnes betalingen på grundlag af de statistiske pålysninger for skoleåret 1994/95. Antallet af studerende inden for ikke specificeret højere uddannelse skal ikke tages i betragtning. For de efterfølgende to kalenderår beregnes betalingen i overensstemmelse med de statistiske oplysninger for skoleårene 1995/96 og 1996/97, med mindre Nordisk Ministerråd beslutter andet.

Artikel 9

Parterne skal i fællesskab følge overenskomstens gennemførelse og foretage de foranstaltninger, som udviklingen kan give anledning til. Med henblik herpå nedsætter Nordisk Ministerråd et rådgivende udvalg, der efter behov skal rapportere til Nordisk Ministerråd om overenskomstens gennemførelse, og som kan afgive forslag om ændringer og tilføjelser til overenskomsten.

Artikel 10

Overenskomsten træder i kraft tredive dage efter den dag, da samtlige parter har givet det finske udenrigsministerium meddelelse om deres godkendelse af overenskomsten, dog tidligst 1. januar 1997.

Overenskomsten skal gælde til udgangen af 1999, såfremt andet ikke forinden aftales.

For Færøernes, Grønlands og Ålands vedkommende træder overenskomsten dog først i kraft, tredive dage efter at Danmarks henholdsvis Finlands regering har underrettet det finske udenrigsministerium om, at Færøernes landsstyre og Grønlands hjemmestyre henholdsvis Ålands landskapsstyrelse har meddelt, at overenskomsten skal have gyldighed for Færøerne og Grønland respektive Åland.

Det finske udenrigsministerium meddeler de øvrige parter og Nordisk Ministerråds sekretariat om modtagelsen af disse meddelelser og om tidspunktet for overenskomstens ikrafttræden.

Artikel 11

En part kan opsige overenskomsten ved skriftlig meddelelse herom til det finske udenrigsministerium, som underretter de øvrige parter om modtagelsen af meddelelsen og om dens indhold.

Overenskomsten ophører at gælde ved udgangen af det kalenderår, hvor den opsiges af en af parterne, hvis opsigelsen er modtaget af det finske udenrigsministerium senest den 30. juni dette år og ellers ved udgangen af det følgende kalenderår.

Opsigelsen af overenskomsten får ingen konsekvenser for de studerende, der er optaget på en videregående uddannelse i et andet nordisk land i overenskomstens gyldighedsperiode.

Artikel 12

Orginalteksten til denne overenskomst deponeres i det finske udenrigsministerium, der tilstiller de øvrige parter bekræftede kopier heraf.

Til bekræftelse heraf har undertegnede, befuldmægtigede repræsentanter undertegnet denne overenskomst.

Udfærdiget i Kbh. den 3.9. 1996 i et eksemplar på dansk, finsk, islandsk, norsk og svensk, hvilke tekster alle har samme gyldighed.

VERBALNOTE

Udenrigsministeriet, Sekretariatet for Ministeren for Nordisk Samarbejde, har den ære at meddele, at Danmark den 28. november 1996 har godkendt Nordisk Overenskomst om Adgang til Videregående Uddannelse, som blev underskrevet i København den 3. september 1996.

København, den 3. december 1996

Den finske, islandske, norske og svenske ambassade i København

c.c. Nordisk Ministerrådes sekretariat, Att.: Susanna Krause,
Undervisningsministeriet, Att.: Niels Heyn Christiansen

1. viðgerð lokið á Alþingi 12. mars 1998. Uppsköttið varð hefnt í utanríkismálanefnd.

Málið fellt burtu skv. stýrisskipanarlögum § 15 stk. 3. tí at logtingsval var 30. apríl 1998, og málið ikki var liðugt viðgjørt á tingi fyri valið.

FL j.nr. 2150-15/93

81 Løgtingslóg um avtøku av løgtingslóg um avmarking av løn í samband við sjúku

Ár 1998, mikudagin 4. marts, legði Vilhelm Johannesen, løgtingsmaður, vegna Javnaðarflokkin fram soljóðandi

Uppskot
til
løgtingslóg um avtøku av løgtingslóg um avmarking av løn í samband við sjúku

§ 1. Løgtingslóg nr. 187 frá 28. desember 1992 um avmarking av løn í samband við sjúku verður sett úr gildi.

§ 2. Hendan lóg fær gildi frá 1. apríl 1998.

Viðmerkingar

Búskaparkreppan, sum hevur valdað í Føroyum seinastu árini, var helst í hæddini í 1992 og í 1993. Tey árini vórðu ymisk politisk krepputiltøk sett í verk. Eitt av hesum tiltøkum rakti frítíðina, frítíðarprosentið og serliga frítíðarskoytið hjá fastlønturn. Eisini fingu vit teir sonevndu karensdagarnar.

Í tingsetuni 1995 samykti løgtingið at broyta lógina um frítíð við løn soleiðis, at frítíðin, frítíðarprosentið og serliga frítíðarskoytið nú eru aftur á sama støði, sum var galdandi, áðrenn tey almennu krepputiltøkini vórðu sett í verk í 1992 og 1993. Við hesum hevur løgtingið ásannað, at kreppan er við at hæsa av.

Við hesum uppskotinum mælir Javnaðarflokkurin til, at tann sokallaða karensdagaskipanin eisini verður sett úr gildi. Flokkurin heldur ikki, at ein avtøka av lógini um avmarking av løn í samband við sjúku hevur nakrar nevniverdar fíggjarligar avleiðingar fyri tað almenna við sær.

Javnaðarflokkurin heldur, at skipanin hevur óheppna ávirkan á arbeiðsumstøðurnar. Fleiri dømi eru um, at fólk fara sjúk til arbeiðis. Undir slíkum umstøðum eru tey ikki før fyri at gera arbeiðið til lítar. Eisini er vandi fyri, at tey smitta onnur á arbeiðsplássinum. Somuleiðis kunnu vit rokna við, at fólk, sum hava goldið fyri tveir karensdagar, velja at verða heima ivaleysa leingi, soleiðis at tey sleppa undan at gjalda fyri tveir karensdagar aftanat.

Dømi er um, at stovnur í Føroyum við fastlønturn starvsfólkum, við fullari undirtøku frá bæði leiðslu og starvsfólkum, hevur gjørt av, at karensdagaskipanin ikki skal nýtast hjá teimum. Vit vita eisini, at í øðrum londum, eitt nú í Svørtki og Danmark, har slíkar lógir hava verið í gildi, eru tær settar úr gildi við teirri grundgeving, at skipanin ikki hevur givið tað ætlaða úrslitið.

Í øðrum løgtingsmáli mælir Javnaðarflokkurin til, at dagpeningalógin verður broytt soleiðis, at tímalønt og onnur, sum í dag fáa sjúkradagpening frá 3. sjúkradegi, skulu fáa hendan dagpening frá 1. sjúkradegi. Við hesum verða fastlønt øðrumegin og tímalønt o. o. hinumegin, javnsett, tá talan er um fráveru orsakað av sjúku.

1. viðgerð mánadagin 16. marts 1998. Uppskotið verður beint í nevndarnar.

Málið fall burtur sbr. stýrisskipanarlógini § 15 stk. 3, tí at løgtingsval var 30. apríl 1998, og málið ikki var liðugt viðgjørt á tingi fyri valið.

82 Broyting í løgtingslóg um arbeiðsmarknaðareftirlønargrunn

Ár 1998, mikudagin 4. mars, legði Vilhelm Johannesen, løgtingsmaður, vegna Javnaðarflokkin fram soljóðandi

Uppskot
til
løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um arbeiðsmarknaðareftirlønargrunn

§ 1.

Í løgtingslóg nr. 39 frá 7. mai 1991 um arbeiðsmarknaðareftirlønargrunn verður gjørd hendan broyting:

Í § 2, 1. stk. verður »1/2%« broytt til »3/4%«.

§ 2.

Hendan lóg fær gildi frá 1. januar 1999.

Viðmerkingar

Endamálið við hesum uppskotinum er at hækka útgjaldið úr arbeiðsmarknaðareftirlønargrunninum. Fyri at røkka hesum máli er neyðugt at hækka inngjaldið. Skotið verður upp, at inngjaldið, sum nú er 1/2 prosent frá hvørjum parti á arbeiðsmarknaðinum, verður hækkað við 0,25 prosentum, soleiðis at hetta verður 3/4 prosent frá hvørjum.

Sum kunnugt fór arbeiðsmarknaðareftirlønargrunnurin at gjalda út tann 1. apríl í fjør. Í 1997 varð mánaðarliga útgjaldið til hvønn móttakara 500 kr. 1. januar 1998 hækkaði útgjaldið uppí 525 kr. Um inngjaldið verður óbroytt, kunnu vit rokna við, at útgjaldið verður 551 kr. um mánaðin í 1999. Um hetta uppskotið hjá javnaðarflokkinum verður samtykt, verður mánaðarliga útgjaldið 810 kr. til hvønn móttakara í 1999 og 852 kr. til hvønn móttakara í ár 2000.

Fyri at lýsa søguligu gongdina, skal verða nevnt, at við løgtingsmáli nr. 120/1987: Lóg um samhaldsfastan arbeiðsmarknaðareftirlønargrunn, varð tann 17. mars 1988 lagt uppskot fram á ting um eina arbeiðsmarknaðareftirløn fyri øll. Í uppskotinum varð ásett, at inngjaldið skuldi verða 3% frá hvørjum parti á arbeiðsmarknaðinum tó soleiðis, at inngjaldið fyrsta árið (1990), skuldi verða 1%, næsta árið 1,5%, triðja árið 2% o. s. fr., til tað frá 1. januar 1997 kom upp á tey 3%. Eftir 1. viðgerð tann 15. apríl 1988 varð málið beint í arbeiðaramálanevndina. Eftir uppskoti frá meirilutanum í nevndini varð endaliga inngjaldið frá pørtunum á arbeiðsmarknaðinum sett til 2%.

Løgtingslóg nr. 71 frá 9. juni 1988 um samhaldsfastan arbeiðsmarknaðareftirlønargrunn, sum kom í gildi frá 1. januar 1990, fór kortini ongatíð at virka. Við løgtingsmáli nr. 58/1990 varð uppskot til arbeiðsmarknaðareftirlønargrunn lagt fram á ting tann 5. apríl 1991. Inngjøldini vórðu nú sett til 1/2% frá hvørjum parti á arbeiðsmarknaðinum. Goldið er inn í grunnin síðani 1. januar 1992. Sum nevnt var útgjaldið 500 kr. um mánaðin fyrsta árið. Við óbroyttum inngjøldum hækkar útgjaldið við 25 kr. um árið tey næstu árini.

Javnaðarflokkurin vísir á, at tað upprunaliga høga inngjaldið í grunnin upp á 3%, varð ásett út frá teimum góðu tíðunum í áttati árunum, meðan tað lága inngjaldið upp á 1/2% frá hvørjum parti varð ásett eftir, at tann herviliga og lemjandi búskaparkreppan var farin at hótta samfelagið. Flokkurin heldur, at nú tíðirnar eru við at gerast meira vanligar aftur, er tað bæði ráðiligt, rætt og rímiligt, at inngjaldið verður hækkað, soleiðis at endamálið við hesum, sum er ein hægri arbeiðs-marknaðareftirløn, lutvíst og stigvíst kann verða rokkið.

Um vit seta okkum fyri, at inngjaldið árliga hækkar við 0,25%, til tað endaliga er komið upp á 2% frá hvørjum parti á arbeiðsmarknaðinum, røkka vit málinum ár 2004. Uttan at hava gjørt nakrar neyvar útroknингar, kunnu vit rokna við, at útgjaldið úr grunninum tá kemur at svara til grunduppheddina í fólkapensi

ón ini. T. v. s. at mánaðarliga útgjaldið úr grunninum ár 2005 fer at liggja í millum 3 og 4.000 kr. um mánaðin.

Hjálagda uppskot verður lagt fram við tí fyri eyga, at gera tað liviligari hjá tí eldra ættarliðnum í Føroyum, og er tað javnaðarfloksins vón og ynski, at hetta uppskot fær eina góða og sakliga viðgerð her á tingi, og ikki minst, at tað vinnur fram millum tingmenn soleiðis, at uppskotnu broytingarnar verða settar í verk

1. viðgerð týsdagin 17. mars 1998. Uppskotið vard beint í trivnaðarnevndina.

Málið fall burtur shr. stýrisskipanarlógini § 15 stk. 3, tí at løgtingsval var 30. apríl 1998, og málið ikki var liðugt viðgjørt á tingi fyri valið.

83 Lóg um endurgjald til Arbeiðsmarknaðareftirlønargrunnin

Ár 1998, mikudagin 4. mars, legði Vilhelm Johannesen, løgtingsmaður, vegna Javnaðarflokkin fram soljóðandi

Uppskot
til
Løgtingslóg um endurgjald til Arbeiðsmarknaðareftirlønargrunnin

§ 1. Úr landskassanum verða kr. 30.200.000.00 endurgoldnar Arbeiðsmarknaðareftirlønargrunninum fyri mista inntøku frá 1. apríl 1993 til 31. mars 1994.
Upphæddin verður goldin í fíggjarárinum 1998.

§ 2. Hendan lóg fær gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

Viðmerkingar

Í 1992 og 1993 var støðan í føroyska samfelagnum sera vánaliga. Arbeiðsloysið øktist við rikandi ferð. Hóast eitt inngjatd upp á 2.75 prosent frá hvørjum parti á arbeiðsmarknaðinum, megnaði Arbeiðsloysisskipanin ikki at svara hvøjum sát, og landskassin, sum hevði sera vánaligt gjaldføri hesi árini, var ikki mentur at veita ALS nakran stuðul útyvir tað, ið landskassin sum almennur arbeiðsgevari rindaði inn í skipanina.

Fyri at tryggja Arbeiðsloysisskipanini nóg mikið av peningi, soleiðis at skipanin kundi gjalda tejm arbeiðstøku tað í lógini ásetta útgjaldið, vórðu ymisk tiltøk sett í verk frá almennari síðu. Millum annað fekk ALS eitt lán úr Arbeiðsmarknaðareftirlønargrunninum (Samhaldsfasta) upp á 70 milliónir krónir. Seinni er semja gjørd millum partarnar (ALS og AMEC) um, hvussu lánið verður rentað og afturgoldið, og gongur hetta nú sína gongd.

Eitt annað tiltak, ið tað almenna setti í verk, var, at inngjaldið til Arbeiðsmarknaðareftirlønargrunnin við lóg varð koyrt í Arbeiðsloysisskipanina í eitt heilt ár. Hetta varð gjørt í tíðarskeiðnum frá 1. apríl 1993 til 31. mars 1994. Samlaða upphæddin, ið ALS fekk burtur úr hesum, var 30,2 milliónir krónur. Samstundis misti Arbeiðsmarknaðareftirlønargrunnurin eina samsvarandi inntøku. Hetta er stórt spell, tá hugsað verður um, hvussu illa nógv av okkara gomlu eru fyri.

Í dag koyrir Arbeiðsloysisskipanin væl. Inngjøldini í grunnin eru mánaðil hægri enn útgjøldini. Við hesi gongdini verður ALS væl konsoliderað, og skipanin verður sostatt før fyri at taka ímóti eini týggjari kreppu, um ein tílík skuldi komið. Fyri at geva ALS møguleikan fyri konsolidering, heldur Javnaðarflokkurin ikki,

at tað er rætt, at álagt verður Arbeiðsloysisskipanini at endurrinda Arbeiðsmarknaðareftirlønargrunninum inntøkumissin frá 1993/94.

Tí verður skotið upp, at landskassin, sum í dag hevur eitt óføra gott gjaldføri, skal endurrinda Arbeiðsmarknaðareftirlønargrunninum nevndu upphædd. Eftir uppskoti frá landsstýrinum, var tað løgtingið, sum tók hesa inntøkuna frá eftirlønargrunninum. Sostatt er tað náttúrligt, at løgtingið nú lóggevur so, at landskassin endurrindar grunninum tapið.

Um uppskotið verður samtykt, eigur upphæddin (30,2 mió. kr.), at verða løgd afturat fæinum hjá Arbeiðsmarknaðareftirlønargrunninum og hetta merkir, at meirinntøkan, sum grunnurin fær í rentuinntøkum av hesum, kemur at ávirka útgjaldið úr grunninum soleiðis, at tað verður 40 kr. hægri um mánaðin.

Um hetta uppskotið og uppskot Javnaðarflokksins í løgtingsmáli nr. 82/1997: Broyting í løgtingslóg um Arbeiðsmarknaðareftirlønargrunn verða samtykt, verður mánaðarliga útgjaldið úr grunninum í 1999 økt uppí 850 kr. og í ár 2000 verður tað 892 kr.

1. viðgerð týsdagin 17. mars 1998. Uppskotið varð beint í trivnaðarnevndina.

Málið fall burtur sbr. stýrisskipanarlógini § 15 stk. 3, tí at løgtingsval var 30. apríl 1998, og málið ikki var liðugt viðgjørt á tingi fyri valið.

84 Uppskot til samtyktar um útbúgvingarfarloyvi

Ár 1998, miðvikudagin 4. mars, legði Luitjen Apol, løgtingsmaður, vegna Verkamannafylkingina fram soljóðandi

andi

Uppskot
til
samtyktar

Heitt verður á landsstýrið um at leggja fyri løgtingið uppskot til løgtingslóg um útbúgvingarfarloyvi við partvísari løn.

Viðmerkingar

Tað er alment viðurkent, at vinnulig framgongd ofta byggir á kunnleikan hjá teimum, sum starvast í vinnuni. So hvørt, sum teknologiska stigið mennist, krevst, at hvørt framleiðslulið kennir til gundleggjandi viðurskifti í framleiðsluni. Dømi um hetta er góð lagreiðing av fiski og fiskavørum, sum keyparamir í dag leggja stóran dent á. Tað er í hesum, at kappingin millum lond í framkomna heiminum stendur: at hava væl útbúgvið arbeiðsfólk og starvsfólk, sum fylgir við og er ført fyri at luttaka í framleiðslu á høgum teknologiskum stigi.

Annað er so tað, at fyri at vit skulu kunna hava hóskandi vøruframleiðing og menning av tænastustøði, er brúk fyri, at tey sum virka í vinnuni, eru før fyri at verða við í prosessum, sum økja um produktivitet og góðsking av øllum slag.

Afturat hesum er tað ein stórur fyriburður, at arbeiðskreftin í einum landi er breitt kunnað, fyri at verða før fyri at umstilla seg til onnur størv ella aðrar funktiónir, tá broytingar henda í vinnusamansetingini.

1. viðgerð týsdagin 17. mars 1998. Uppskotið varð beint í trivnaðarnevndina.

Málið fall burtur sbr. stýrisskipanarlógini § 15 stk. 3, tí at løgtingsval var 30. apríl 1998, og málið ikki var liðugt viðgjørt á tingi fyri valið.

85 Uppskot til samtyktar um prístalsviðgerð av lønum

Ár 1998, mikudagin 4. mars, legði Luitjen Apol, løgtingsmaður, vegna Verkamannafylkingina fram soljóðandi

Uppskot
til
samtyktar

Heitt verður á landsstýrið um at leggja fyri løgtingið uppskot til løgtingslóg um prístalsviðgerð av lønum.

Viðmerkingar

Lógin um prístalsviðgerð av lønum varð avtikin í flestu grannalondum okkara í 80'árunum og varð avtikin í Føroyum við løgtingslóg nr. 42 frá 27. mars 1990. Skotið verður upp at seta prístalsviðgerð av lønum í gildi aftur. Her skal grundgevast fyri at seta lógina í gildi av nýggjum.

Tað eru í búskaparpolitikki serliga tvey mál at røkja:

1. búskaparligur vøkstur og
2. rímiligt býti av ríkidøminum.

Ofta verða hesi bæði sett upp móti hvørjum øðrum soleiðis, at javnt býti av samfelagságóðanum skal eitast at forða fyri vøkstrinum. Hetta er orsøkin til, at borgarligur politikkur mangan ofrar sosialt rættvísi fyri búskaparvøkstri.

Tað kann væl verða, at allar tær vinnur, sum eru í landinum í dag, høvdu borið seg betur, um lønirnar vóru lægri enn nú. Helst høvdu vit eisini kunnað havt upp aftur fleiri arbeiðspláss, tí tá kundu vit kappast við lond, sum hava hægri lønir, enn vit hava. Settu vit lønirnar nóg langt niður, kundu vit kappast á upp aftur fleiri marknaðum, og høvdu kunnað inntlutt arbeiðsmegi úr fátækari londum til at framleiða slíkt, sum í dag verður framleitt í fátøkum londum.

Vit kunnu fáa fleiri arbeiðspláss og meira virksemi, um vit bara seta lønirnar ivaleysa langt niður. Ella vit kunnu syrgja fyri, at lønirnar ikki vaksa fyri støðugt at bøta um kappingarførið. Men er tað henda gongdin vit ynskja? Ynskja vit at lækka lønarstøðið, so at vit kunnu framleiða í kapping við fátøcka heimin á slíkum marknaðum, - ella ynskja vit at skipa okkara vinnulív soleiðis, at vit hækka velferðina hjá tejmutn, sum búgva í landinum? Tí, um vit vilja tað, so er leiðin ikki lønarniðurskurður, men tvørturímóti at stíla eftir framleiðslu, sum kann bera góðar lønir, og sum kann veita borgarunum eitt gott og hækkandi livistøði.

Tað hevur í fleiri ár verið frammi í føroyskum politikki eitt borgarligt ynski um at lækka lønirnar soleiðis, at vinnurekandi skulu hava lættari við at fáa fyritøkurnar at bera seg. Tcir borgarligu heita á løntakararnar um at vísa samfelagssinni, fyri at fáa tey at minka um lønarkrøvini ella beinleiðis um at lata sær lynda lønarfall.

Hetta hevur helst eisini verið orsøkin til, at prístalsviðgerðin av lønum helt uppat, soleiðis at prísirnir kundu hækka - og harvið livikostnaðurin, - uttan at lønirnar fylgdu við. Harumframt hava sáttmálaúrslitini verið soltin tey seinastu árini, soleiðis at tey lægst løntu serliga eru sigld nógv afturút.

Spurningurin er, um prístalsviðgerð av lønum fer at gera kappingarført Føroya vertt. Til tað er at siga:

1. Mesti innflutningur Føroya kemur úr ES-londum, og eitt tað fremsta búskaparliga mál ES er støðug prístega.
2. Politisku myndugleikarnir í Føroyum ávirka í stóran mun kostnaðarstøðið við sínum fíggjarpolitikki. Royndirnar frá 80'unum vísa okkum greitt, hvat ein upphitaður búskapur hevur við sær. Prístalsviðgerð

av lønum átti at verið ein forðing - ein bremsa - fyri »villum« inflasjónsskapandi politikki, sum skapar verri kappingarføri mótvegis útlondum.

Ikki hevur prísvøksturin verið av tí nógva tey seinastu árini í mun til tíðina frá mitt í 70'árunum til endan av 80'árunum. Tað er rættiliga trúligt, at vit kunnu koma í ta støðu aftur, at prísirnir fara at hækka, og at samfelagsgongdin verður tann, at tað verður stórur lønarmunur. Verður tað so, at olja verður funnin við Føroyar, so fara vit at fáa eina vinnu við nógv bægri lønum enn í øðrum vinnum. Tað er, sum tað má, men avleiðingin verður helst, at vit fáa størri prísvøkstur, enn talan hevur verið um í fleiri ár. Tær stóru inntøkurnar í oljuvinnuni fara at trýsta príslagið upp eftir soleiðis, at tann veruliga keypiorkan hjá øðrum løntakarum fer at versna.

Inflasjónin kann koma av ymsum ávum, tá verulig oljuvinna kemur í gongd.

1. Stórar inntøkur í oljuvinnuni økja privata eftirspurningin og hava við sær hægri bústaðarkostnað og tænastuprísir í Føroyum. Eisini er vandi fyri, at handilsmenn fara at taka sær størri vinning av økta eftirspurninginum.
2. Oljuvinna hevur við sær yvirskot á gjaldsjavna og sostatt yvirskotslikviditet í fíggjarsektorinum. Vandi er tí fyri, at peningamongd/kredittupphædd veksur skjótari enn framleiðslan í samfelagnum, og verður hetta inflasjónsskapandi.
3. Oljuvinna hevur við sær yvirskot á fíggjarlógini. Spurningurin er, um politisku myndugleikarnir duga at halda aftur, so almenna nýtslan av hesum ikki veksur skjótari enn vøksturin í inntøkunum í øðrum vinnum. Um ikki, hevur hetta inflasjón við sær.

Sum heild kann sigast, at politisku myndugleikarnir og leiðslurnar fyri fíggjarstovnum hava avgerandi orðið at siga, hvussu inflasjónin verður komandi árini. Henda ábyrgd teirra verður ikki minni, um oljuvinna tekur seg upp í Føroyum. Uppskotið verður lagt fram serliga fyri at verja tey lægst løntu móti ábyrgdarleysum fíggjar- og kredittpolitikki.

Til seinast kann viðmerkjast, at tað er ikki lønarvøkstur í Føroyum, ið er orsøk til vánuligu kappingarføri Føroya, sum ofta verður tosað um. Tí lønarliga kappingarføri Føroya er nevniliga batnað munandi síðani 1990. Vøksturin í lønarkostnaði hjá føroysku vinnuni hevur verið lítil og eingin.

1. viðgerð týsdagin 17. mars 1998. Uppskotið varð beint í vinnunevndina

Málið fall burtur sbr. stýrisskipanarlógini § 15 stk. 3, tí at løgtingsval var 30. apríl 1998, og málið ikki var liðugt viðgjørt á tingi fyri valið.

86 Uppskot til samtyktar um útrokning av prístali

Ár 1998, mikudagin 4. mars, legði Luitjen Apol, løgtingsmaður, vegna Verkamannafylkingina fram soljóð andi

Uppskot
til
samtyktar

Heitt verður á landsstýrið um at leggja fyri løgtingið uppskot til løgtingslóg um prístal

Viðmerkingar

Prístalið, sum nú verður roknað, er sera langt frá veruleikanum. Vektirnar í prístalinum, sum vísa skulu nýtslumynstrið í húsarhaldinum, eru gjørdar út frá einari nýtslukanning í 1971/1972. Hetta nýtslumynstur

er nógv broytt síðani tá, men vektirnar eru enn galdandi. Sum dømi kann verða nevnt, at bústaðarkostnaður varð mettur at verða sløk 11% av livikostnaðinum, men veruleikin er tann, at her átti kanska heldur at staðið millum 30% og 40%.

At hava prístal, sum er rættvísandi, hevur eisini annan týdning. Tað hevur týdning fyri fleiri myndugleikar, serliga hagtalsliga, at vita, hvussu kostnaðurin hjá húsarhaldinum broytist. Hetta er fyri at kunna fylgja við broytingum í nøgdum í samfelagnum, tá prísvøkstur er frátroknaður.

Í 1989, eftir ta stóru kravgonguna móti ætlanini hjá táverandi samgongu at avtaka prístalsviðbótina, lovaði Jógvan Sundstein, løgmaður, at gera nýtt prístal, sum vísti veruligu gongdina í livikostnaðinum. Hetta arbeiðið liggur framvegis á láni.

1. viðgerð týsdagin 17. mars 1998. Uppskotið varð beint í vinnunevndina.

Málið fall burtur sbr. stýrisskipanarlógini § 15 stk. 3, tí at løgtingsval var 30. apríl 1998, og málið ikki var liðugt viðgjørt á tingi fyri valið.

87 Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um Forskotsgrunn Fiskiflotans

Ár 1998, hósdagin 5. mars, legði John Petersen, landsstýrismaður, vegna landsstýrið fram soljóðandi

Uppskot
til
løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um Forskotsgrunn Fiskiflotans

§ 1.

Í § 4 í løgtingslóg nr. 71 frá 23. mai 1997 um Forskotsgrunn Fiskiflotans verður orðið »Lønjavningargrunnurin« broytt til: »Løhjavningarstovan«.

§ 2.

Henda lóg kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

Viðmerkingar
Víst verður til løgtingsmál nr. 92 um Lønjavningargrunn.

Mælt verður til, at orðið »Lønjavningargrunnurin« verður broytt til »Lønjavningarstovan«.

Kostnaður av broytingini er ongin.

Málið fall burtur sbr. stýrisskipanarlógini § 15 stk. 3, tí at løgtingsval var 30. apríl 1998, og málið ikki var liðugt viðgjørt á tingi fyri valið.

L.Lj.nr. 1500-28/97

88 Rammuavtala millum Føroya Landsstýri og Grønlendska Landsstýri um sínámillum fiskirættindi

Ár 1998, hósdagin 5. mars, legdi John Petersen, landsstýrismaður, vegna landsstýrið fram soljóðandi

Uppskot
til
samtyktar

Vísandi til til § 52 í løgtingslóg nr. 103 frá 26. juli 1994 um stýrisskipan Føroya og til § 23 í løgtingslóg nr. 28 frá 10. mars 1994 um vinnuligan fiskiskap, við seinni broytingum, góðkennir løgtingið hjáløgdu rammuavtalu um sínámillum fiskirættindi millum Føroyar og Grønland, fyribils galdandi frá 27. mai 1997.

Viðmerkingar

Hjáløgd er avtalan um tingingar millum Føroya landsstýri og Grønlands landsstýri um sínámillum fiskirættindi. Henda rammuavtalan er sambæri grein 6 fyribils sett í verk tann 27. mai 1997.

Føroyar og Grønland hava leingi samstarvað á fiskivinnuøkinum í altjóða felagsskapum sum NEAFC (fiskiveiðinevndin fyri landnyrðingspartinum av Atlantshavinum) og NAFO (fiskiveiðifelagsskapurin fyri útnyrðingspartinum av Atlantshavinum).

Svartkalvi og kongafiskur eru felags fiskastovnar millum Føroyar og Grønland (og Ísland). Í næstum verður avtala undirskrivað millum strandalondini Føroyar, Grønland og Ísland um fyristing av svartkalva og kongafiski.

Teir ferðandi stovnar, ið Føroyar og Grønland hava ábuga í, eru kongafiskur í Irmingarhavinum og várgýtandi norðhavssildin.

Í 1997 varð ein fyribils avtala gjørd um bæði kongafisk og síld, har Føroyar kundu veiða upp til 4.500 tons av kongafiski í Irmingarhavinum, og av hesum kundu 3.500 tons fiskast í grønlendskum sjógvi. Grønland kundi veiða 3.000 tons av føroysku kvotuni av várgýtandi norðhavssildini, ið eisini kundi verða fiskað í føroyskum sjógvi. Harafturat var semja um at Grønland flytir fiskidagar eftir rækjum við Flemish Cap til Føroyar.

Umframt hetta er í 1998 avtala gjørd um royndarfiskiskap. Eitt føroyskt skip kann reka royndarveiðu eftir svartkalva norðanfyri 68°50'N í Norðurvesturgrønlandi, og eitt grønlendskt línuskip kann reka royndarveiðu á djúpum vatni í føroyskum sjógvi.

Rammuavtalan veitur møguleika fyri, at Føroyar og Grønland víðka samstarvið innan fiskivinnu í framtíðini.

Avtala

um tingingar millum
Føroya landsstýri og Grønlands landsstýri
um sínámillum fiskirættindi

Føroya Landsstýri og Grønlands Landsstýri,

sum vilja varðveit og menna samvinnu teirra millum,

sum hava í huga, at Føroyar og Grønland hava fiskiøki upp á 200 fjórðingar,

sum hava í huga grundleggjandi týdningin, sum fiskivinnan hevur fyri búskapin í báðum londunum og samvinnuna, ið verið hevur landanna millum fiskivinnu viðvíkjandi,

og sum ynskja at áseta reglur fyri sambandið teirra millum viðvíkjandi fiskivinnu,

eru vorðin samd um:

Grein 1

1. Partarnir skulu hittast einaferð um árið at metu um felags fiskivinnumál og at finna møguleikar fyri at fáa atgongd til til fiskiøkini hjá hvørjum øðrum at fiska partar av teimum kvotum, sum metast verða at kunna verða gagnnýttar skilagott við sínamillum atgongd.

2. Partarnir skulu haraftrar meta um gagnnýtsluna av tilfeinginum í havinum.

3. Samstundis skulu partarnir meta um møguleikan fyri at arbeiða saman á fiskivinnuøkinum t.d. við Joint Venture ella øðrum samstarvi bæði innan tað almenna og tað privata.

Grein 2

1. Fiskifør hjá øðrum partinum skulu, tá ið tey fiska inniá hjá hinum partinum, retta seg eftir friðingartiltøkum, lógum og fyriskipanum., og øðrum reglum og treytum fyri fiskiskapi, ið viðkomandi partur, inni á hvørs øki fiskiskapurin fer fram, hevur ásett.

2. Tá ið nýggjar lógir, fyriskipanir, reglur ella treytir, sum ávirka, hvussu fiskiskapurin hjá øðrum partinum kann fara fram inni á fiskiøkinum hjá hinum partinum, verða samtyktar, skal boðast frá hesum í hóskandi tíð frammanundan.

Grein 3

1. Hvør av pørtunum skal ansa eftir, at hansara borgarar og før halda reglurnar í hesari avtalu og aðrar fyriskipanir fyri fiskiskap.

2. Hvør av pørtunum kann á sínum øki, í samsvari við altjóða rætt, seta neyðug tiltøk í verk til at tryggja sær, at førini hjá hinum partinum halda reglurnar í hesi avtalu.

Grein 4

1. Avvarðandi myndugleikar hjá hvørjum partinum, skulu boða avvarðandi myndugleikum hjá hinum partinum frá upplýsingum av týdningi fyri tey fiskifør, ið ætla at fiska inniá hjá hinum partinum samsvarandi grein 1. Tá ið teir fáa slíka fráboðan, skulu partarnir, hvør eftir síni lóggávu, gevn loyvi, ið neyðug eru til at gera hin partin føran fyri at fiska tær kvotur,ið fingnar eru.

2. Eftir áheitan skulu partarnir lata hvørjum øðrum upplýsingar um avreiðingar í fiskiøkinum hjá hinum partinum.

Grein 5

1. Partarnir vilja samarbeiða til tess at tryggja forsvarliga umsiting og varðveiting av tí, sum livir í havinum, serliga, tá talan er um

a) stovnar, ið finnast inná hjá báðum pørtum, og
b) stovnar av felags áhuga, ið finnast inniá hjá báðum pørtum og á leiðum nærhendis uttanfyri øki teirra.

2. Partarnir skulu samráðast um, hvussu henda avtala skal setast í verk, og hvussu samvinnan partanna millum kann mennast.

Grein 6

1. Henda avtala verður fyribils sett í verk dagfestingardagin og kemur endaliga í gildi, tá ið báðir partar hava boðað frá, at tær neyðugu mannagongdirnar, ið stýrisskipan teirra ásetur, eru uppfyltar.

2. Henda avtala skal galda fyri eitt tíðarskeið upp á 10 ár, roknað frá tí hon kemur í gildi. Verður hin ikki uppsagd av øðrum partinum minst 12 mánaðir áðrenn hetta tíðarskeið er runnið út, skal avtalan framvegis galda í eitt nú 6 ára skeið er liðið.

Sett upp í Keypmannahavn 1997 í tveimum eintøkum ávikavist á føroyskum og donsku, ið hædi hava sama gildi.

Undirritað í Tórshavn 27. mai 1997.

Málið fall burtur sbr. stýrisskipanarlógini § 15 stk. 3, tí at løgtingsval var 30. apríl 1998, og málið ikki var lidugt viðgjørt á tingi fyri valið.

Fl.-j.nr. 1555-8/90

89 Løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um sjómenn

Ár 1998, hósdagin 5. mars, legði John Petersen, landsstýrismaður, vegna landsstýrið fram soljóðandi

Uppskot
til
løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um sjómenn

§ 1.

Í løgtingslóg nr. 4 frá 15. januar 1988 um sjómenn, sum broytt við løgtingslóg nr. 117 frá 21. mai 1993 verða gjørdar hesar broytingar:

1) § 55, stk. 1 verður orðað soleiðis:
»Sjómaður skal hava neyðugu tíð til hvíld og svøvn. Fyri hvørt sandøgur skal hvíldartíðin vera í minsta lagi 10 tímar. Hvíldartíðin kann býtast upp í 2 tíðarbil, har annað skal vera í minsta lagi 6 tímar. Víkjast kann frá hesum ásetingum í neyðstøðu, í sambandi við venjingar og tá ið trygd skipsins annars krevur tað.«

2) Í § 55 verður eftir stk. 1 sett sum nýtt stk. 2:
»*Stk.* 2. Uttan mun til ásetingarnar í stk. 1 kann hvíldartíðin setast niður í 6 tímar um sandøgrið í eitt tíðarskeið uppá tveir fylgjandi dagar. Treytin fyri hesum er tó, at í minsta lagi 70 tíma hvíld fæst í eitt tíðarskeið upp á 7 sandøgur.«
Stk. 2–4 verða hereftir stk. 3-5.

§ 2.

Henda lóg kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd. Samstundis verður danski teksturin í lógini strikaður.

Viðmerkingar
Ein av broytingunum í STCW-78 sáttmálanum í 1995 vóru reglurnar um hvíldartíð hjá sjófólki. Reglurnar um hvíldartíð eru skrivaðar í kapitul 6 í løgtingslóg nr. 4 frá 15. januar 1988 um sjómenn við seinni broytingum.

Broytingin hevur ongar fíggjarligar ella umsitingarligar avleiðingar.

Til 1). STCW-sáttmálin ásetur, at hvíldartíðin skal vera minst 10 tímar fyri hvørt samdøgur. Hvíldartíðin kann deilast upp í 2 tíðarbil, harav tann eina skal vera minst 6 tímar samanhangandi.

Víkjast kann frá hesum áseting um í neyðstøðum, í samband við venjingar og tá ið trygd skipsins annars krevur tað.

Til 2). Hvíldartíðin kann setast niður í 6 tímar um samdøgurið í eitt tíðarskeið uppá tveir fylgjandi dagar. Treytin fyri hesum er tó, at í minsta lagi 70 tíma hvíld fæst í eitt tíðarskeið upp á 7 samdøgur.

Málið fall burtur sbr. stýrisskipanarlógini § 15 stk. 3, tí at løgtingsval var 30. apríl 1998, og málið ikki var liðugt viðgjørt á tingi fyri valið.

F.L. j.nr. 1604-4/91

90 Avtøka av løgtingslóg um vaktar- og bjargingartænastuna

Ár 1998, hósdagin 5. marts, legði John Petersen, landsstýrismaður, vegna landsstýrið fram soljóðandi

Uppskot
til
løgtingslóg um avtøku av løgtingslóg um vaktar- og bjargingartænastuna

§ 1. Løgtingslóg nr. 83 frá 24. oktober 1978 um vaktar- og bjargingartænastuna verður avtikin.

§ 2. Henda lóg kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

Viðmerkingar
Vaktar- og bjargingartænastan er sambært løgtingslóg nr. 83 frá 24. oktober 1978 sett á stovn sum stovnur undir landsstýrinum.

Eftir at stýrisskipanarlógin er komin í gildi, er tað landsstýrismaðurin á økinum, sum ger av, hvussu stovnar undir hansara málsøki verða skipaðir.

Eftir sum løgtingslógin um vaktar- og bjargingartænastuna bert ásetur fyrisitingina av stovninum verður lógin avtikin. Vaktar- og bjargingartænastan er løgd saman við Fiskiveiðieftirlitinum og eru nærri reglur ásettar í løgtingslóg nr. 28 frá 10. mars 1994 um vinnuligan fiskiskap við seinni broytingum.

Mett verður ikki, at avtøka av hesi lóg fer at broyta nakað um kostnaðin umsitingarliga, tí umsitingin er tann sama.

Málið fall burtur sbr. stýrisskipanarlógini § 15 stk. 3, tí at løgtingsval var 30. apríl 1998, og málið ikki var liðugt viðgjørt á tingi fyri valið.

F.L.j.nr. 367-5/90

91 Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um bjargingarútgerð á opnum bátum og á førum undir 20 tons

Ár 1998, hósdagin 5. mars, legði John Petersen, landsstýrismaður, vegna landsstýrið fram soljáðandi

Uppskot
til
løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um bjargingarútgerð á opnum bátum og á førum undir 20 tons

§ 1.

Í løgtingslóg nr. 72 frá 13. mai 1992 um bjargingarútgerð á opnum bátum og førum undir 20 tons verða gjørdar hesar broytingar:

1) Í § 2, nr. 12 verður orðingin »Skrokksertifikat, bert fyri glastrevjabátar« strikað.

2) § 4 verður orðað soleiðis:

»§ 4. Kappróðrarfør og bátar undir 20 fót (6,20m) koma ikki undir reglurnar í §§ 2 og 3 í hesi lóg. Landsstýrismanninum verður heimilað at áseta nærri reglur um útgerð á kappróðrarbátum og førum, sum ikki koma undir §§ 2 og 3 í hesi lóg«.

3) § 7, stk. 1 verður orðað soleiðis:

»Landsstýrismanninum verður heimilað at áseta nærri reglur um nýtslu og burturbeining av neyðraketтum og um keyp og sølu av slíkari útgerð«.

§ 2.

Henda lóg kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd. Samstundis fer danski teksturin í løgtingslóg nr. 72 frá 13. mai 1992 um bjargingarútgerð á opnum bátum og á førum undir 20 tons úr gildi.

Viðmerkingar

Samsvarandi løgtingslóg nr. 72 frá 13. mai 1992 um bjargingarútgerð á opnum bátum og á førum undir 20 tons er ásett, hvør útgerð skal verða umborð á førum.

Róðrarsamband Føroya hevur gjørt vart við, at reglurnar eru til ampa fyri nóðurin og at tað ikki eru allir bátar, sum taka útgerðina við. Fundir hava verið haldnir millum Vaktar- og bjargingartænastuna, sum hevur eftirlit við reglunum, og eftirsum reglurnar ikki eru upprunaliga ásettar fyri kappróðrarbátar, so ber til at broyta krøvini nakað fyri hesi før.

Vaktar- og bjargingartænastan mælir til, at kappróðrabátar ikki koma undir §§ 2 og 3 í lógini, men at ein minsta útgerð skal vera umborð, sum er: Bjargingarvestur til hvønn persón, 2 pøsir at oysa við, kumpass til bát, radarreflektor, ið er festur á stong, ið rókkur minst ein metur yvir stavnarnar, floyta ella blásilóður umframt 3 handbluss og lummalykt.

Viðmerkingar til tær einstøku greinarnar

Ad 1) og 3): Hesar broytingar eru av tekniskum slag, tí bert fáir bátar hava skrokksertifikat og burturbeining og nýtsla av neyðraketтum er tað, sum greinin snýr seg um.

Ad 2): Heimilað verður landsstýrismanninum at áseta krøv til kappróðrabátar og før, sum ikki koma undir §§ 2 og 3 í kunngerð.

Viðmerkjast skal, at lógin hevur ikki umsitingarligan kostnað við sær, og at talan er um samtia uppskot, sum varð samtykt á Føroya Løgting hin 30. apríl 1997.

Av misgáum varð samtykta uppskotið ikki lagt fyri løgmann at staðfesta, og varð tí ikki kunngjørt innan

ásettu tíðarfreistina uppá 30 dagar, samsvarandi § 26 í løgtingslóg um stýriskipan Føroya, og er tí neyðugt at leggja uppskotið fram av nýggjum.

Málið fall burtur sbr. stýrisskipanarlógini § 15 stk. 3, tí at løgtingsval var 30. apríl 1998, og málið ikki var liðugt viðgjørt á tingi fyri valið.

F.L. j.nr. 1600-1/90

92 Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um Lønjavningargrunn

Ár 1998, hósdagin 5. mars, legði John Petersen, landsstýrismaður, vegna landsstýrið fram soljóðandi

Uppskot
til
løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um Lønjavningargrunn

§ 1.

Í løgtingslóg nr. 73 frá 23. mars 1997 um Lønjavningargrunn verða gjørdar hesar broytingar:

1) Har orðini »Lønjavningargrunn, Lønjavningargrunnurin og Lønjavningargrunninum« kemur fyri í lógini, verða orðini »Lønjavningarstovu, Lønjavningarstovan og Lønjavningarstovuni« sett ístaðin.

2) Í § 4 verður orðingin »og í spurningum viðvíkjandi fyrisitingini hjá lønjavningargrunninum« strikað.

§ 2.

Henda lóg kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

Viðmerkingar

Lønjavningargrunnurin er samb. løgtingslóg nr. 73 frá 23. mars 1997 ikki ein sjálvstøðugur grunnur, men ein Lønjavningarstova. Stovan hoyrir beinleiðis undir landsstýrismannin í fiskivinnumálum, og skal fyrisita skipanir, tengdar at fíggjarviðurskiftum fiskimanna.

Tí verður navnið »Lønjavningargrunnurin« broytt til »Lønjavningarstovan«.

Kostnaður av broytingini er ongin.

Til 1) Mælt verður tí til, at har orðini »Lønjavningargrunn, Lønjavningargrunnurin og Lønjavningargrunninum« kemur fyri í lógini, verða orðini »Lønjavningarstovu, Lønjavningarstovan og Lønjavningarstovuni« sett ístaðin.

Til 2) Nýggja stýriskipanarlógin gevur einstøku landsstýrismonnunum fulla ábyrgdina av málsøkjum sínum og harvið fyrisitingini av málsøkjunum. Tað verður tí hildi at vera skeivt at tað í lógini verður fyrisett, at yrkisráðið skal ráðgeva landsstýrismonnunum í fyrisitingarligum spurningum. Mælt verður tí til, at orðingin »og í spurningum viðvíkjandi fyrisitingini hjá lønjavningargrunninum« verður strikað.

Málið fall burtur sbr. stýrisskipanarlógini § 15 stk. 3, tí at løgtingsval var 30. apríl 1998, og málið ikki var liðugt viðgjørt á tingi fyri valið.

F.L. j.nr. 1585-9/97

93 Uppskot til løgtingslóg um manning av skipum

Ár 1998, hósdagin 5. mars, legði John Petersen, landsstýrismaður, vegna landsstýrið fram soljóðandi

Uppskot
til
løgtingslóg um manning av skipum

Kapittul 1

§ 1. Lógin fevnir um skip undir føroyskum flaggi.

§ 2. Í hesari lóg merkir:

1) »Sjóvinnufyrisitingin«: Myndugleikin í hesi lóg, sum fyrisitingarliga er skipaður undir landsstýrismanninum í sjóvinnumálum.
2) »Fiskiskip«: Eitt og hvørt skip ella far, sum verður nýtt til vinnuligan fiskiskap og hevur veiðuloyvi frá Fiskimálastýrinum.
3) »Handilsskip«: Eitt og hvørt skip, tá tó fiskiskip og stuttleikafør eru undantikin.
4) »Ferðamannaskip«: Handilsskip, sum flytur meira enn 12 ferðafólk.
5) »Farmaskip«: Handilsskip, sum ikki eru ferðamannaskip.
6) »Stuttleikafar«: Skip, sum ikki verður nýtt til vinnuligt endamál. Er ivamál, avgerð Sjóvinnufyrisitingin, um eitt skip skal metast sum stuttleikafar.
7) »Havskip«: Skip, sum er í sigling uttanfyri havnir, áir, innsjógvar ella vard øki.
8) »STCW-átekning«: Sjóvinnuhrav ella viðurkenningarváttan, sum verður útskrivað samsvarandi ásetingum í millumlanda sáttmálanum um úthúgving av sjófólki, um sjóvinnu og um vaktarhald á skipum frá 1978 við seinni broytingum (STCW-sáttmálin).
9) »STCW-F-átekning«: Sjóvinnuhrav ella viðurkenningarváttan, sum verður útskrivað samsvarandi ásetingum í millumlanda sáttmálanum um manning við fiskiskipum frá 1995 (STCW-F-sáttmálin).
10) »Bruttotons«: Bruttotonsatal (BT), sum til eina og hvørja tíð er tilskilað í skipsins málibrævi, men soleiðis at brotin tøl falla burtur, um nøkur eru.
11) »Longd«: Longd á skipi mátað sambært lóg um uppmáting av skipum og sum hon er ásett í metrum í málibrævi skipsins.
12) »Framtøkumegi«: Øll tann samanlagda megin í kilowatt (kW), men soleiðis at brotin tøl falla burtur, um nøkur eru, við støðuga gongd á øllum maskinum, sum samstundis kunnu dríva skipið fram. Orkan verður ásett grundað á royndarflatutalvuna hjá motorverksmiðjuni, og verður hon at seta í siglingarloyvisbrævið og manningarskjalið.
13) »Strandasigling«: Sigling, meðan fráleikin er ikki meira enn 30 fjóðingar frá beinum grundlinjum drignar gjøgnum 12 støð sum tilskilað í løgtingslóg um vinnuligan fiskiskap.
14) »Heimasigling«: Sigling, meðan fráleikin er ikki meiri enn 200 fjórðingar frá beinum grundlinjum drignar gjøgnum 12 støð sum tilskilað í løgtingslóg um vinnuligan fiskiskap.
15) »Altjóða sigling«: Sigling uttanfyri strandasigling og heimasigling.
16) »Góðkend«: Góðkend samhæft løgtingslóg um sjómansútbúgvingar ella onnur útbúgving, sum er góðkend av Undirvísingar- og mentamálastýrinum.

§ 3. Á øllum skipum skal vera skipari og haraftrat so mikil manning, sum tørvur er á til at tryggja mannalív á sjónum.

Kapittul 2

Fiskiskip og handilsskip

§ 4. Fyri ferðamannaskip, uttan mun til støddd og sigliøki, fyri fiskiskip og farmaskip yvir 20 bruttotons uttan mun til sigliøki og fyri fiskiskip og farmaskip minni enn 20 bruttotons uttanfyri strandasigling, setir Sjóvinnufyrisitingin manningina. Fyri fiskiskip og farmaskip minni enn 20 bruttotons í strandasigling, kann Sjóvinnufyrisitingin áseta manningina, um mett verður, at atlitið til trygdina fyri mannalívum á sjónum ger hetta neyðugt.

Stk. 2. Manningarásetingin verður skrivað á skjal, sum Sjóvinnufyrisitingin gevur út. Hetta skjal skal altíð vera umborð á skipinum.

Stk. 3. Fyri skip til støddar minni enn 20 bruttotons í strandasigling kann manningin verða ásett fyri bólkar av skipum og í staðin fyri at skriva prógv, sum tilskilað í stk. 2, kann verða fráboðað um ásetingina

við kunngerð.

Stk. 4. Manningin verður ásett fyri hvørt skipið sær við atliti til slag av skipi, innretting, útbúnað, nýtslu og siglingarleið, so at manningin er slík til nøgd og samanseting, at alt arbeiði fæst gjørt, sum hevur týdning fyri tryggleikan hjá skipi og teimum, sum eru umborð, eitt nú:

1) at halda dygga brúgva- og maskinvakt,
2) at nýta og umsita bjargingarambað,
3) at nýta og umsita útgerð til sjóskaðaansingar, eldsløkkingar og samskiftingar,
4) at halda við líka og halda reint tað, sum aðrarnáta viðvíkir tryggleikanum,
5) at leggja skipið fyri teym ella við bryggju,
6) at matgera og hava heilsuatstøður í lagi.

Stk. 5. Við áseting av manningini skal aftrat atlit verða havt til vaktarskipanina umborð, til liðarbeiði, til veruligu arbeiðstíðina hjá teimum einstøku starvsbólkunum, til galdandi reglur um hvíldartíð og til eindarmanningarskipan.

§ 5. Skiparar, brúgva- og maskinyvirmenn skulu hava sjóvinnubrøv sambært niðanfyristandandi talvum. Frumritið skal vera umborð.

SKIPARAR OG STÝRIMENN

TALVA 1. Handilsskip undir 500 bruttotons í strandasigling

Bruttotons	Skipari	Stýrimaður
20-99	Heimaskipari við handilsskipum (STCW-regl. II/3 as Master)	Dugnaskaparbræv í sigling við handilsskipum (STCW-regl. II/3 as Watchkeeping Officer)
100-499		Stýrimaður á 4. stigi við handilsskipum (STCW-regl. II/3 as Watchkeeping Officer)

TALVA 2. Onnur handilsskip uttan mun til sigliði

Bruttotons	Skipari	Yvirstýrimaður	Aðrir stýrimenn
20-2999	Skipari við handilsskipum (STCW-regl. II/2 as Master)	Stýrimaður á 3. stigi við handilsskipum (STCW-regl. II/2 as Chief Mate)	Stýrimaður á 3. stigi við handilsskipum Stýrimaður á 4. stigi (STCW-regl. II/2 as Watchkeeping Officer)
3000-	Skipstørari (STCW-regl. II/2 as Master)	(STCW-regl. II/2 as Chief Mate)	

TALVA 3. Fiskiskip í strandsigling

Bruttotons	Skipari	Yvirstýrimaður	Aðrir stýrimenn
20-99	Dugnaskaparbræv í sigling við fiskiskipum	Dugnaskaparbræv í sigling við fiskiskipum	
100-799	Heimaskipari við fiskiskipum	Stýrimaður á 4. stigi við fiskiskipum	
800-	Skipari við fiskiskipum	Stýrimaður á 3. stigi við fiskiskipum	Stýrimaður á 4. stigi við fiskiskipum

TALVA 4. Fiskiskip í heimasigling

Bruttotons	Skipari	Yvirstýrimaður	Aðrir stýrimenn
20-99	Heimaskipari við fiskiskipum	Dugnaskaparbræv í sigling	
100-799	Heimaskipari við fiskiskipum	við fiskiskipum	
800-	Skipari við fiskiskipum	Stýrimaður á 4. stigi við fiskiskipum Stýrimaður á 3. stigi við fiskiskipum	Stýrimaður á 4. stigi við fiskiskipum

TALVA 5. Fiskiskip í altjóða sigling

Bruttotons	Skipari	Yvirstýrimaður	Aðrir stýrimenn
20-99	Heimaskipari við fiskiskipum	Stýrimaður á 4. stigi við fiskiskipum	
100-799	Skipari við fiskiskipum	Stýrimaður á 3. stigi við fiskiskipum	
800-	Skipari við fiskiskipum	Stýrimaður á 3. stigi við fiskiskipum	Stýrimaður á 3. stigi við fiskiskipum

MASKINYVIRMENN

TALVA 6. Handilsskip í altjóða sigling

Framtøkumegi (kW)	Maskinstjóri/ Einamaskinmeistari	1. maskinmeistari	Aðrir maskinmeistarar
100-449	Dugnaskaparbrøv í motorpassing		
100 749	Motorpassari		
750-2999	Skipsmaskinistur á 1. stigi (STCW-regl. III/3 as Chief Engineer	Skipsmaskinistur á 2. stigi (STCW-regl. III/3 as 2nd Engineer	Skipsmaskinistur á 2. stigi ella vakthavandi maskinyvirmaður
3000-	Skipsmaskinstjóri (STCW-regl. III/2 as Chief Engineer)	Skipsmaskinmeistari á 1. stigi (STCW-regl. III/2 as 2nd Engineer)	(STCW-regl. III/1 as Watchkeeping Officer)

TALVA 7. Handilsskip í strandasigling og heimasigling

Framtøkumegi (kW)	Maskinstjóri/ Einamaskinmeistari	1. maskinmeistari	Aðrir maskinmeistarar
100-449	Dugnaskaparbrøv í motorpassing		
450-749	Motorpassari		
750-1499	Skipsmaskinistur á 2. stigi	Skipsmaskinistur á 2. stigi	
1500-2999	Skipsmaskinistur á 1. stigi (STCW-regl. III/3 as	Skipsmaskinistur á 2. stigi (STCW-regl. III/3 as	Skipsmaskinistur á 2. stigi ella vakthavandi maskin-
3000-	Chief Engineer Skipsmaskinstjóri (STCW-regl. III/2 as Chief Engineer)	2nd Engineer Skipsmaskinmeistari á 1. stigi (STCW-regl. III/2 as 2nd Engineer)	yvirmaður (STCW-regl. III/1 as Watchkeeping Officer)

TALVA 8. Fiskiskip í altjóða sigling

Framtøkumegi (kW)	Maskinstjóri/ Einamaskinmeistari	1. maskinmeistari	Aðrir maskinmeistarar
100-449	Dugnaskaparbrøv í motorpassing		
450-749	Motorpassari		
750-2999	Skipsmaskinistur á 1. stigi	Skipsmaskinistur á 2. stigi	Skipsmaskinistur á 2. stigi ella vakthavandi maskinyvirmaður
3000-	Skipsmaskinstjóri	Skipsmaskinmeistari á 1. stigi	

TALVA 9. Fiskiskip í strandasigling og heimasigling

Framtøkumegi (kW)	Maskinstjóri/ Einamaskinmeistari	1. maskinmeistari	Aðrir maskinmeistarar
100-449	Dugnaskaparbrøv í motorpassing		
450-749	Motorpassari		
750-1499	Skipsmaskinistur á 2. stigi	Skipsmaskinistur á 2. stigi	
1500-2999	Skipsmaskinistur á 1. stigi	Skipsmaskinistur á 2. stigi	Skipsmaskinistur á 2. stigi ella vakthavandi maskinyvirmaður
3000-	Skipsmaskinstjóri	Skipsmaskinmeistari á 1. stigi	

Stk. 2. Persónur við dugnaskaparbrævi í motorpassing, sum verður krevdur, kann um somu tíð verða skipaður í annað starv umborð.
Stk. 3. Sjóvinnufyrisitingin kann økja ella minka um tey førleikakrøv, sum stk. 1 og § 11, stk. 1 og 2, setir við aditi til innrætting, útbúnað, siglingarleið og ferðamannatal umborð á skipum.
Stk. 4. Á skipum skrásettum í Føroysku Altjóða Skipaskránni (FAS), verða ikki kravd føroysk sjóvinnubrøv, men gild sjóvinnubrøv við STCW-áteking frá Sjóvinnufyrisitingini samsvarandi ásetingunum í 1. stk. Skipari skal tó hava heimarætt.
Stk. 5. Landsstýrismaðurin í sjóvinnumálum kann áseta, at brúgvayvirmenn og maskinyvirmenn við fiskiskipum skulu hava sjóvinnubrøv við STCW-F-átekning.

§ 6. Radiopassarar á skipum, sum sambært galdandi fyriskipanum skulu hava radiotelefonútgerð til nýtslu í altjóða maritimu trygdarskipanini (GMDSS), skulu hava føroysk vinnubrøv sum skipsradiopassarar við STCW-átekning.
Stk. 2. Á skipum skrásettum í Føroysku Altjóða Skipaskránni (FAS), verða ikki kravd føroysk sjóvinnubrøv, men gild sjóvinnubrøv við STCW-áteking frá Sjóvinnufyrisitingini til tænastu sum skipsradiopassarar.

§ 7. Á førum, har manningin er større enn 8, men ikki større enn 20, skal vera kokkur, og á førum, har manningin er større eisini kokkadrongur. Í hesum tølum er kokkur ikki taldur. Á ferðamannaskipum kann Sjóvinnufyrisitingin fyriseta størri tal av kokkum.
Stk. 2. Fyriskipaður kokkur ella hovmeistari skal hava vinnubræv sum skipskokkur.
Stk. 3. Á skipum, skrásettum í Føroysku Altjóða Skipaskránni (FAS), verður foyvt at vera í starvi sum skipskokkur uttan sjóvinnubræv, um avvarðandi hevur havt lærutíð tilsamans 48 mánaðir í kokkayrkinum, av hesum í minsta lagi 24 mánaðir á havskipum.

Kapittul 3
Stuttleikafør

§ 8. Á stuttleikaførum til støddar 20 bruttotons og størri, men minni enn 100 bruttotons skal vera skipari og stýrimaður við sjóvinnubrævi til fiskiskip ella handilsskip samsvarandi niðanfyristandandi tabvu:

Siglingarøki	Skipari	Stýrimaður
Strandasigling	Dugnaskaparbræv í sigling	Dugnaskaparbræv í sigling
Uttanfyri strandasigling	Heimaskipari	Dugnaskaparbræv í sigling

Stk. 2. Fyri stuttleikafør til støddar 100 bruttotons og størri ásetir Sjóvinnufyrisitingin manningina.
Stk. 3. Til at passa maskinuna á stuttleikaførum til støddar 20 bruttotons og størri við framtøkumaskinu til støddar 100 kW og størri, men minni enn 750 kW, skal, tá ið maskinan kann verða stillað og skrúvustýring fara fram frá róðurplássinum, í strandasigling, verða 1 persónur við dugnaskaparbrævi í motorpassing. Fyri onnur stuttleikafør til støddar 20 bruttotons og størri við framtøkumaskinu til støddar 100 kW og størri ásetir Sjóvinnufyrisitingin maskinmanningina.
Stk. 4. Tá ið Sjóvinnufyrisitingin sambært stk. 2 og 3 ásetir manningina, skal verða gingið eftir § 4, stk. 4.
Stk. 5. Sjóvinnufyrisitingin kann áseta førleikakrøv til skiparar á stuttleikaførum til støddar minni enn 20 bruttotons og krøv til maskinmanning á slíkum førum.

Kapittul 4
Førleikakrøv

§ 9. Eingin má verða settur til sjálvstøðuga vakt umborð sum stýrimaður ella maskinmeistari, uttan at hava sjóvinnubræv, sum í minsta lagi fýkur treytirnar fyri setta hægsta starv sum ávikavist stýrimaður ella maskinmeistari.

§ 10. Landsstýrismaðurin í sjóvinnumálum ásetir, ansandi bindandi altjóða sáttmálum og í samráð við umboð fyri reiðara- og sjómannafeløgini førleikakrøv til
1) dekks-, maskin og eindarmanning,
2) sjúkraviðgerðara umborð
3) manningar umborð á ferðamannaskipum og
4) yvirmenn og manning umborð á olju-, kemikaliu og gasstangaskipum.

Stk. 2. Sjóvinnufyrisitingin kann harafturat áseta serlig førleikakrøv, herundir økja ella minka um lógar-

innar førleikakrøv og manningarreglur fyri

1) persónar, sum eru í starvi, har lógin ikki setir serlig førleikakrøv, og
2) yvirmenn og manning umborð á
   a) skipum við serstakum stýrieginleikum,
   b) skip við serstakari innrætting og serstakari útgerð,
   c) serskip og skip við serstakum byggihátti,
   d) skip, sum verða nýtt á landafrøðiliga avmarkaðum siglingarleiðum

Stk. 3. Tá ið Sjóvinnufyrisitingin samtykkir sambært stk. 2 ásetur manningina, skal verða gingið eftir § 4, stk. 4.

Kapittul 5

Sjóvinnubrøv

§ 11. Landsstýrismaðurin í sjóvinnumálum ásetir, ansandi bindandi altjóða sáttmálum og í samráð við umboð fyri reiðara- og sjómannafeløgini, treytirnar fyri at fáa tey í hesi lóg nevndu sjóvinnubrøv, her undir krøv um

1) førleika,
2) siglingartíð,
3) heilsustøðu
4) sjónar- og hoyrnarevni
5) aldur og
6) at viðkomandi er myndugur og ikki undir verjumáli.

Stk. 2. Til at fáa sjóvinnubrøv við fararartíttindum verður kravt, at viðkomandi hevur danskan heimarætt. Landsstýrismaðurin í sjóvinnumálum kann, eftir tilmæli frá reiðara- og sjómannafeløgunum, í serliguni førum víkja frá kravinum um heimarætt.

§ 12. Sjóvinnubrøv verða útgivin ókeypis.

Stk. 2. Sjóvinnubrøv verða útgivin av Sjóvinnufyrisitingini.

Stk. 2. Sjóvinnubrøv eru í gildi í 5 ár frá útgevingardegnum. Landsstýrismaðurin í sjóvinnumálum ásetir treytir fyri endurnýggjan av sjóvinnubrøvum, um endurvinning av sjóvinnubrævarættindum og um útgevan av fyrsta sjóvinnubrævinum til persónar, sum hava staðið ta til sjóvinnubrævið kravdu úthúgving meira enn 5 ár frammanundan útgevingardagin.

Stk. 2. Sjóvinnufyrisitingin ásetur, ansandi bindandi altjóða samtyktum, reglur fyri átekning av útlendskum sjóvinnubrøvum og góðkenning av útlendskum prógvum.

§ 13. Landsstýrismaðurin í sjóvinnumálum kann taka aftur sjóvinnubræv, um so er, at viðkomandi, sum brævið hevur, við sigling sínari ella faðrari tæn astu umborð hevur verið beinleiðis hóttan móti lívi, ogn ella umhvørvi ella um tað vegna sálarligu ella likamligu støðuna verður mett óráð at lata viðkomandi virka framhaldandi í tí starvi, sum sjóvinnubrævið gevur rætt til.

Stk. 2. Tann, ið hevur fingið sjóvinnubrev, skal geva seg undir slíkar leknakanningar, sum eru neyðugar, tá ið avgerð skal verða tikin um teir spurningar, sum nevndir eru í stk. 1. Útreiðslurnar í samband við slíkar kanningar rindar landskassin. Sleppur tann persónur, sum vinnubrævið hevur, sær undan áløgdum kanningum, kann sjóvinnubrævið verða afturtikið.

§ 14. Tann persónur, sum avgerðin viðvíkur, kann krevja, at afturtøka sjóvinnubrævsins verður løgd fyri dómstólarnar. Áheitan um hetta skal vera sett fram fyri landsstýrismanninum í sjóvinnumálum, áðrenn 4 vikur eru gingnar eftir, at avgerðin er fráboðað avvarðandi.

Stk. 2. Í avgerð landsstýrismansins í sjóvinnumálum skal vera skilað til um rættin til at krevja dómstólaroynd og freistirnar í hesum sambandi.

Stk. 3. Tá ið afturtøka av sjóvinnubrøvum verður kravd løgd fyri dómstólarnar, byrjar landsstýrismaðurin í sjóvinnumálum rættarmál í móti avvarðandi samsvarandi reglunum um borgarliga rættargongu. Málið er sjórættarmál.

Stk. 4. Áheitan um at leggja málið fyri rættin, førir við sær, at afturtøkan av sjóvinnubrævinum steðgar. Landsstýrismaðurin í sjóvinnumálum kann tó ásetа, at áheitan um at leggja málið fyri rættin ikki ger steðg í aftertøkuni. Henda avgerð landsstýrismansins í sjóvinnumálum kann tó verða sett úr gildi við rættarúrskurði, og tað áðrenn avgerð verður tikin um, hvørt tøkan var lóglig.

§ 15. Sjóvinnubræv, sum er afturtikið, verður latið Sjóvinnufyrisitingini.

Stk. 2. Landsstýrismaðurin í sjóvinnumálum kann til eina og hvørja tíð geva tikið sjóvinnubræv aftur, tá umstøðurnar, sum vóru orsøk til afturtøkuna, ikki longur vera hildnar at vera til staðar. Verður umsókn um at fáa brævið aftur noktað, kann umsøkjarin krevja spurningin lagdan fyri dómstólarnar. Um málið áður hevur verið lagt fyri dómstólarnar, kann hetta tó ikki verða fyrr enn í minsta lagi 1 ár eftir, at frátøkan seinast var staðfest við dómi. § 14, stk. 2 og 3 verða nýtt tilsvarandi.

§ 16. Tann rættur til at føra skip, sum fylgir við vinnubrøvum fellur burtur, tá ið tann, sum hevur

brævið, missir danskan heimarætt. Landsstýrismaðurin í sjóvinnumálum kann tó, tá ið serliga ber til, veita undantøk frá hesari reglu. Fær avvarðandi aftur danskan heimarætt, skal rætturin at føra skip somuleiðis verða roknaður sum afturfingin, smb. tó § 12, stk. 3.

Kapittul 6

Reiðararans og skiparans ábyrgd

§ 17. Reiðarin og skiparin skulu tryggja sær:

1) at øll starvsett sjófólk, lúka tey til starvið kravdu útbúgvingar-, førleika- og vinnubrævakrøv, og at tey kravdu prógv eru umborð í frumriti,
2) at dagført yvirlit er til skjals yvir øll starvsett sjófólk, teirra starv umborð, teirra heilsustøðu og harafturat skjalprógv fyri teirra førleikum,
3) at øll nýmynstraði sjófólk, áðrenn skipstænastan byrjar, fáa neyðugu frágreiðing um teirra arbeiði umborð, herundir um útgerð, innleggingar og neyðskipanir og harafturat um serstakar fyriskipanir, sum hava týdning fyri bæði teirra vanaarbeiði umborð og teirra uppgávur í eini neyðstøðu,
4) at skipsmanningin til lítar kunn samskipa uppgávurnar í neyðstøðum og í førum, tá vandi er fyri dálking, og
5) at manningin kann samskifta sínámillum um trygdarmál og skilja trygdarboð, herundir skelti, tekin og ávaringartekin.

Stk. 2. Landsstýrismaðurin í sjóvinnumálum kann gera nærri reglur um tær ásetingar, ið nevndar eru í stk. 1 og har áseta serlig samskiftis- og málkrøv.

Kapittul 7

Vanligar fyriskipanir

§ 18. Hin og hvør, sum verður settur í starv umborð, sum henda lóg fevnir um, skal lúka tey førleikakrøv, sum lógin ásetur.

Stk. 2. Stýrimaður ella maskinmeistari, sum settur verður út um ásetta talið, skal ikki verða havdur til sjálvstøðuga vakt uttan so, at hann hevur sjóvinnubræv í minsta lagi á sama stigi, sum kravt er fyri starv sum lægsti stýrimaður ella lægsti maskinmeistari á skipinum.

Stk. 3. Landsstýrismaðurin í sjóvinnumálum kann áseta nærri reglur um vaktarhald á skipum.

§ 19. Missir skip nakað av fyriskipaðu manning sini av sjúku, deyða, rýming ella aðrari orsøk, sum skipari ella reiðarí hava ikki ábyrgd av, tá skulu krøv ásett í ella sambært hesi lóg ikki forða, at skiparin við umhugsni um sjódyggleika skipsins heldur fram ferðina. Manningin skal tó skjótast til ber fáast upp á fult tal aftur. Skiparin skal føra inn frágreiðing um hesi viðurskifti í skipsdagbókina, ella um skipsdagbók verður ikki førd, í eftirlitsbókina.

§ 20. Landsstýrismaðurin í sjóvinnumálum kann, eftir samráð við reiðara- og sjómannafelágini, broyta tey í hesi lóg ásettu tonsamørk til onnur mørk, sum sett eru í aðrari málieind og broyta tey í hesi lóg ásettu mørk fyri framtøkumegi.

§ 21. Sjóvinnufyrisitingin kann, ansandi bindandi altjóða samtyktum og § 4, stk. 4, í serligum førum og í avmarkaðum tíðarskeiði økja ella minka um manningartalið sambært manningarskjalinum.

Stk. 2. Sjóvinnufyrisitingin kann í serligum førum og ansandi bindandi altjóða samtyktum, loyva, at persónur verður havdur í starvi, tó at hann hevur ikki slíkt vinnubræv, sum krevst í starvinum, men bert fyri einstaka ferð ella ávíst tíðarbil, sum ikki skal vera longri enn 6 mánaðir.

Undanáseting

§ 22. Sjóvinnufyrisitingin ásetir eftir áheitan manningina fyri skip, sum byggiætlan er gjørd fyri, fyri skip, sum skal umbyggjast, og fyri útlendskt skip, sum ætlanin er at føra undir føroyskt flagg (undanáseting).

Stk. 2. Metir Sjóvinnufyrisitingin, at ein undanáseting fæst ikki gjørd á nóg tryggan hátt, verður áheitanin vist aftur við neyðugari grundgeving.

Stk. 3. Ein undanáseting - møguliga broytt við kæru til sjóvinnuráðið - er bindandi, uttan so at broyting hevur verið í teimum fyritreytum, sum hava verið avgerðandi fyri ásetingina.

Sjóvinnuráðið

§ 23. Avgerðir, sum Sjóvinnufyrisitingin hevur tikið sambært § 4, stk. 3, 4 og 5, § 5, stk. 3, § 8, stk. 2, 3 og 5, § 10, stk. 2, § 21, stk. 1 og 2 og § 22, stk. 1 kunnu avvarðandi reiðarí ella sjómannafelóg leggja fyri sjóvinnuráðið, sum tekur tá endaligu fyrisitingarligu avgerðina.

Stk. 2. Avgerð, har áheitan um undanáseting ikki er gingin á møti, kann tó ikki verða løgd fyri ráðið.

Stk. 3. Er undanásetingin ikki, áðrenn ein mánaður er gingin, løgd fyri ráðið, kann avgerð um endaligu manningarásetingina samsvarandi undanásetingini ikki verða løgd fyri ráðið, uttan broytingar hava verið í teimum fyritreytum, sum vóru avgerandi fyri ásetingina.

Stk. 4. Í Sjóvinnuráðnum situr formaður, sum skal

vera løgfrøðingar, ið landsstýrismaðurin í sjóvinnumálum tilnevnir, og eitt umboð fyri hvørt av sjómannafeløgunum, eins nógv umboð fyri reiðarafeløgini, allir tilnevndir av landsstýrismanninum í sjóvinnumálum eftir tilmæli frá avvarðandi feløgum. Fyri hvønn lim verður tilnevndur ein eykalimur.

Stk. 5. Landsstýrismaðurin í sjóvinnumálum ásetir reglur um málsviðgerðina í nevndini.

Revsifyriskipan

§ 24. Við sekt verður hann revsaður, sum brýtur § 3, § 4, stk. 2, § 5, stk. 1 ella 6, § 6, § 7, § 8, stk. 1 ella 3, § 9, § 17, nr. 1 ella 2 og § 19, nr. 2 ella 3, ella brýtur tær manningarásetingar, sum eru gjørdar sambært hesari lóg.

Stk. 2. Í fyriskiparum, sum ásettar verða sambært hesi lóg, kann sektarrevsing verða ásett fyri brot á reglurnar í ásetingunum smb. tó § 25, stk. 4.

§ 25. Við sekt, hefti ella fongsli í upp til 1 ár verður tann revsaður, ið brýtur § 17, stk. 1, nr 3, 4 ella 5.

Stk. 2. Revsingin kann økjast til hefti ella fongsul í upp til 2 ár, um brotið er gjørt við vilja ella orsakað av grovum ósketni og um tað í samband við brotið er

1) hendur skaði á ungfólk undir 18 ár, ella vandi hevur verið fyri tí, ella
2) fingin fíggjarligur vinningur, frøknaðar sparingar til viðkomandi sjálvan ella onnur, ella hetta hevur verið ætlanin.

Stk. 3. Verður ikki hald lagt á vinning, ið fingin er í samband við brotið, skal serligt atlit havast til stødd-ina á tí fingna ella ætlaða vinninginum, tá ið sekin verður ásett, smb. stk. 2, nr. 2.

Stk. 4. Í ásetingum, ið verða gjørdar sambært § 17, stk. 2 viðvíkjandi § 17, stk. 1, nr 3-5, kann sum revsing ásetast bót, hefti ella fongsul í upp til 1 ár. Eisini kann ásetast, at revsingin kann vaksa til hefti ella fongsul í upp til 2 ár, um viðurskiftini líkjast teimum, ið nevnd eru í stk. 2.

§ 26. Fyri brot, sum verða framd av partafeløgum, lutafeløgum og slíkum felagsskapum, kann sektin verða áløgd felagnum sum slíkum. Er brotið framt av einari kommunu ella á líkan hátt av kommunalum felagsskapi, sum fevndur er av løgtingslóg um føroysku kommunurnar, kann sekt verða løgd á kommunur ella kommunala felagsskapin.

Kapittul 8.

Gildiskoma og umskiftisásetingar

§ 27. Henda lóg kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

Stk. 2. Samstundis fer løgtingslóg nr. 5 frá 15. januar 1988 um manning av skipum við seinni broytingum og løgtingslóg nr. 16 frá 3. mars 1988 um sjóvinnu við seinni broytingum úr gildi.

Stk. 3. Tær ásetingar, sum eru gjørdar sambært tær í stk. 2 nevndu lógum, vera framvegis í gildi, til ásetingar sambært hesi lóg verða settar í gildi ístaðin.

§ 28. Sjóvinnubrøv, útgivin áðrenn lógin fekk gildi, geva ánarum teirra somu rættindi sum teir høvdu frammanundan. Sjóvinnubrøv, sum geva rættindi til tænastu sum dekksyvirmaður, maskinyvirmaður ella radiopassari við handilsskipum eru tó bert gild til tann 1. februar 2002.

Stk. 2. Fyri skip, ið eru minni enn 24 m til longdar, og sum bert eru uppmáld sambært áður galdandi málireglum, verður tað í skipsins málibrævi ásetta bruttoregistartonsatal (BRT), rundað niðureftir uttan brottøl, nýtt í staðin fyri tað í hesi lóg ásetta bruttotonsatal (BT).

§ 29. Skip, sum eru í sigling tann dag lógin fær gildi, og hvørs manning ikki er ásett í lógini, skal hava manning samsvarandi teimum manningarreglum og manningarásetingum, sum higartil hava verið galdandi, til nýggj manning er ásett.

Stk. 2. Fyrir manningarásetingin, sum nevnd er í stk. 1, við sær minni krøv, skal minkingin av manningini teir fyrstu 6 mánaðirnar frá ásetingini bert fara fram við náttúrligari frágongd ella við komu í føroyska havn. Donsk ella Grønlendsk havn verða bert mettar sum føroysk havn um so er, at sjómaðurin hevur bústað í Føroyum ella Grønlandi.

Almennar viðmerkingar

Í juli 1995 bleiv ein stjórnarráðstevna hildin í altjóða havfelagsskapinum IMO (International Maritime Organisation) í London um sjóvinnu-, sjóvinnuútbúgvingar og vaktarhald á skipum. Talan var um at broyta verandi konvensjón, ella sáttmála, til handilsskip og at gera nýggjan tilsvarandi sáttmála til fiskiskip.

IMO felagsskapurin hevði í mong ár verið undir trýsti frá mongum pørtum fyri ikki at gera eitt nóg gott arbeiði fyri at betra um trygdina á sjónum, nú serliga aftaná tær stóru skipsvanlukkurnar um okkara leiðir tey seinastu árini.

Fleiri teknisk krøv til skip vórðu tó samtykt í 80-unum og fram í 90-ini. Men krøvini til tann menniskjaliga partin høvdu ikki í sama mun fylgt við menningini á økinum. Ein altjóða sáttmáli innan hetta øki var tó gjørdur í 1978 (STCW-78), men var eftir hondini blivin so útvatnaður og veikur, at neyðugt var við munandi broytingum.

Ein annar trupulleiki við sáttmálanum var eisini, at hesin ikki megnaði at hyrgja fyri teimum mongu følsku sjóvinnubrøvunum millum sjófólk, serliga frá menningarlondunum.

Í 1993 samtykti so IMO at fara undir at endurskoða handilsskipasáttmálan. Í sama viðfangi bleiv samtykt, at ein tilsvarandi sáttmáli skuldi gerast til fiskiskip.

Undirnevndirnar í IMO arbeiddu ógvuliga skjótt við hesum og longu 2 ár seinni kundi ein stjórnarráðstevna viðgera broytingaruppskotini og uppskotið til nýggja fiskiskipasáttmálan. Ráðstevnan samtykti bæði uppskotini í juli 1995. Broytingarnar í handilsskipasáttmálanum komu í gildi 1. februar í ár, tó soleiðis at partar av hesi hava eina tillagingartíð uppá 5 ár. Fiskiskipasáttmálin, STCW-F, kemur í gildi altjóða 12 mánaðir eftir, at 15 lond hava tikið undir við honum. Somuleiðis her eru nakrar skiftisreglir uppá 5 ár eftir, at hesin er komin í gildi í einum limalandi.

Sjóvinnufyrisitingin umboðaði Føroyar saman við Danmark í teimum samráðingum, sum fóru fram í tíðarskeiðnum 1994-95.

Sum fylgja av, at Føroyar hava staðfest handilsskipasáttmálan (í 1990) og sum eina fyrireiking til staðfesting av fiskiskipasáttmálanum, setti landsstýrismaðurin í sjóvinnumálum í januar 1997 ein arbeiðsbólk, við tí endamáli, at koma við uppskotum til neyðugar broytingar í manningar-, sjóvinnu-, sjómans-, og mynstringarlógini.

Nevndin skuldi eisini viðgera nýggja fiskiskipasáttmálan og geva landsstýrinum tilmæli um, hvørt tað í manningar- og sjóvinnulógini í størri mun skuldi skiljast ímillum fiski- og handilsskip, tá hesi skulu uppfylla nevndu sáttmálar.

Nevndin var samansett við umboðum fyri Sjóvinnufyrisitingina, sum hevði formannin, Føroya Skipara- og Navigatørfelagið, Maskinmeistarafealgið, Føroya Reiðarafelag, Reiðarafelagið fyri farmaskip, Fiskimannafelagið og landsstýrið.

Í arbeiðssetninginum hjá nevndini er m.a. ásett, at undir viðgerðini av nýggja fiskiskipasáttmálanum skal nevndin koma við tilmæli um, hvørt tað í manningar- og sjóvinnulógini í størri mun skuldi skiljast ímillum fiski- og handilsskip.

Í uppskotinum til manningarlógina, og tá serliga í uppskotinum til kunngerðina til lógina, verður skilt sundur í ávísan mun í ásetingunum til fiskiskip og handilsskip.

Grundgevingin fyri hesum er fyrst og fremst tann, at tann krevda siglingartíðin ikki er eins og at fiskiskipa-

sáttmálin er linari enn handilsskipasáttmálin. Fyri útgávu av fyrsta sjóvinnubrevi, sum gevur rættindi við handilsskipum, er galdandi, at hendan skal vera skjalprógvað í einari útbúgvingarbók, t.v.s. at undir fyrireikandi siglingartíðini skal viðkomandi fáa neyðugan førleika til viðkomandi viðurskifti umborð undir eftirliti av einum yvirmanni. Hetta er tó ikki sáttmálakrav fyri teir, sum sigla í 36 mánaðir. Fyri fiskiskip er hinvegin ikki galdandi, at tann kravda siglingartíðin skal vera skjalprógvað í einari útbúgvingarbók.

Av tí, at báðir sáttmálarnir ikki gera mun á maskinavnastu við handils- ella fiskiskipum, vil nevndin skjóta upp, at útbúgvingarbókin á hesum økinum verður nýtt umborð á báðum skipaslagunum. Maskinmeistarar við føroyskari útbúgving kunnu so uttan trupulleikar fáa rættindi umborð á báðum skipaslagunum.

Útbúgvingin í sjómansskúlunum í Føroyum er soleiðis samansett, at tann ástøðiligi parturin uppfyllir báðar sáttmálarnar til skipara- og skipsføraraútbúgvingina. Tað er, sum nevnt omanfyri, fyrst og frenst tann kravda siglingartíðin, sum munur er á.

Hetta merkir sjálvsagt, at fyri at viðkomandi skal kunna fáa rættindi sum stýrimaður við handils- ella fiskiskipum, skal viðkomandi umframt útbúgvingina eisini hika treytirnar fyri siglingartíð í ávikavist handils- og fiskiskipum.

Ásetingarnar um kravda siglingartíð broyta hóast alt ikki nógv í verandi skipan. Teir kravdu 6 mánaðirnir við handilsskipum skulu framvegis vera í gildi fyri at fáa rættindi við handilsskipum. Ein partur av kravdu siglingartíðini skal vera fingin við skipum yvir 500 bruttotons í altjóða sigling. Áður var hetta markið 200 bruttoregistartons. Hinvegin er nú krav um, at fyri at fáa rættindi við fiskiskipum, skulu minst 6 mánaðir siglingartíð vera fingin við fiskiskipum.

Nevndin hevur viðgjørt ásetingarnar í tí nýggja fiskiskipasáttmálan STCW-F. Hesin sáttmáli hevur linari krøv enn handilsskipasáttmálin. Samstundis sum tær føroysku lógirnar í stórri mun eru bygdar á handilsskipasáttmálan, og hervið eru ásetingarnar til fiskiskip á sama støði sum til handilsskip, hevur hetta evnið verið eitt afturvendandi umtaluevni á nevndarfundunum. Serliga eru tað manningarfelagini sum vísa á, at fiskiskipasáttmálin ikki skal vera páskot til at lækka krøvini til fiskiskip. Hinvegin hevur umboðið fyri Føroya Reiðarafelag víst á, at manningarkrøvini til føroysk fiskiskip ikki skulu vera hægri enn ásetingarnar í STCW-F sáttmálanum. Sagt verður, at hetta m.a. er grundað á kappingarføri hjá okkum í mun til grannalond okkara. Í fylgisskjølunum til álitið er ein samanbering av krøvunum hjá Noregi og Íslandi. Í Noregi eru krøvini linari enn í Føroyum, meðan tey eru strangari í Íslandi.

Tá talan er um krav til av manning umborð verður víst til manningarskjalið hjá hvørjum skipi sær, sum er ásett av Sjóvinnufyrisitingini. Manningartalið kann broytast umsitingarliga uttan at hetta grípur inn í ásetingarnar í STCW-F sáttmálanum.

Hinvegin ásetur sáttmálin m.a. førleikakrøv til manning umborð á skipum yvir eina ávísa stødd.

Nevndin er í høvuðsheitum samd um førleikakrøvini, sum áselt eru í talvunum í § 5 í uppskotinum til manningarlógina. Umboðið fyri Føroya Reiðarafelag tekur tó ikki undir við kravinum um, at tað við fiskiskipum, við framtøkumegi uppá 3000 kW ella størri, skal vera ásettur ein persónur við sjóvinnubrevi sum skipsmaskinstjóri (3 ára útbúgving). Føroya Reiðarafelag vísir til STCW-F sáttmálan, sum loyvir maskinistum á 1. stigi (1 ára útbúgving) óavmarkaðí rættindi við fiskiskipum sum maskinstjórar. Maskinistar á 2. stigi kunnu, sambært sama sáttmála, vera 1. meistarar á øllum fiskiskipum. Umboðið fyri Maskinmeistarafelagið tekur ikki undir við hesum, vísandi til, at fiskiskip tøknuliga ikki eru verri útgjørd enn handilsskip.

Lógaruppskotið til manningarlógina er gjørt við atliti at ásetingunum í bæði í STCW- og STCW-F-sáttmálunum.

Nevndin hevur ikki viðgjørt spurningin um úthúgvingar, sum annars er ein týðandi partur av báðum sáttmálunum. Hetta økið liggur undir landsstýrismanninum í undirvísingarmálum.

Nevndin mælir til, at sjómansútbúgvingarnar og skeiðvirksemi verða dagførd skjótast gjørligt og í seinasta lagi 1. august 1998, sum er sáttmálakrav.

Í hesum sambandi hevur nevndin viðgjørt spurningin um gjøld í samband við kravd skeið sambært STCW- og STCW-F-sáttmálarnar.

Ein meirluti í nevndini, umboðini fyri reiðara- og sjómannafeløgini mæla til, at hesi skeið vera ókeypis fyri luttakararnar. Talan er t.d. um tað almenna kravið um trygdarskeið og tey skeið, sum skulu takast, fyri at viðkomandi kann varðveita rættindini, tá tey gomlu STCW-78 sjóvinnubrøvini skulu umbýtast til tey nýggju sambært broytingunum í sáttmálanum.

Nevndin ásannar, at tað eru nøkur viðurskifti í sjómans- og mynstringarlógini, umframt altjóða krøvini, sum átta at fingið eina gjølligari viðgerð. M.a. eru tað nakrar kunngerðir til sjómanslógina, sum ongantíð eru gjørdar. Hetta er tó uttanfyri arbeiðssetningin hjá nevndini. Men nevndin mælir landsstýrismanninum í sjóvinnumálum til at seta hetta arbeiðið í gongd

Fíggjarligar og fyrisitingarligar avleiðingar
Broytingarnar í fyriliggjandi lógum og kunngerðum kunnu fáa nakrar eyka fíggjarligar avleiðingar í inniverandi fíggjarári. Mett er, at kr. 200.000 skulu setast av til útvegan av edv-útgerð í samband við útgávu av sjóvinnubrøvum í nýggjum sniði og til skráseting av øllum sjóvinnubrøvum og prógvum. Hetta er tó treytað av, at tað framvegis verður møguligt at útgeva føroysk sjóvinnubrøv við STCW- og STCW-F-átekning.

Sambært lógaruppskotinum skal sjóvinnumyndugleikin árita útlendsk sjóvinnubrøv, fyri at teir kunnu fáa rættindi til at starvast umborð á føroyskum skipum. Í dag eru fáir útlendingar við føroyskum skipum og kann hetta tí gerast við verandi umsiting.

Gjørt verður vart við, at tað er av alstórum týdningi bæði fyri føroysk handilsskip og fyri sjótólk við sjóvinnubrøvum, sum geva rættindi til handilsskip, at bæði landsstýrismaðurin í sjóvinnumálum og løgtingið tekur hædd fyri broytingunum í handilsskipasáttmálanum STCW longu í hesi tingsetuni. Hetta kann gerast við at samtykkja fyriliggjandi uppskot til nýggja manningarlóg og við at samtykkja broytingina í sjómanslógini.

Niðurstøða
Ein samd nevnd mælir landsstýrismanninum í sjóvinnumálum til at taka undir við tí nýggja altjóða fiskiskipasáttmálanum um úthúgving, sjóvinnu og vaktarhald á fiskiskipum, STCW-F-1995 og leggja hann fyri Føroya Løgting til samtyktar. Landsstýrismaðurin tekur undir við hesum og verður hetta lagt fram serskilt.

Nevndin mælir landsstýrismanninum í sjóvinnumálum til at leggja fyriliggjandi uppskot til nýggja manningarlóg og broyting í sjómanslógini fyri Føroya Løgting. Landsstýrismaðurin tekur undir við hesum og verður hetta uppskot fyrilagt løgtinginum. Broytingarnar í sjómanslógini eru serskiltar og fyrilagdar løgtinginum.

Nevndin mælir landsstýrismanninum í sjóvinnumálum til, eftir at nýggja manningarlógin er sett í gildi, at seta í gildi uppskotið til kunngerð um sjóvinnubrøv og førleikakrøv. Hetta verður gjørt eftir gildiskomu lógarinnar og staðfestingini av STCW-F sáttmálanum.

Sum nevnt undir samandráttinum hevur verður skotið upp at samanskriva verandi manningarlóg við partar av verandi sjóvinnulóg. Útyvir broytingar í innihaldinum í lógunum, verður ein stórur partur í verandi

sjóvinnulóg sambært uppskotinum ásett í ansitingarligum reglum, t.e. kunngerð frá fiskimálastýrinum. Tann parturin av sjóvinnulógini, sum verður førdur yvir í manningarlógina, er í høvuðsheitum viðvíkjandi mannagongd í samband við afturtøku av sjóvinnubrævi hjá persónI, sum missur rættindi til at hava hetta vegna sálarligu ella likamligu støðuna. Galdandi ásetanin í sjóvinnulógini um afturtøku av sjóvinnubrævi, vegna mistan heimarætt, hjá teimum, sum hava førararættindi á føroyskum skipum, er nú skrivað inn í uppskotið til manningarlógina.

Tann parturin av sjóvinnulógini, sum verður førdur yvir í kunngerð, er viðvíkjandi treytum fyri at fáa sjóvinnubrøv, treytir fyri mynstring av dekkarum, motormonnum og skipsatstøðarum, treytir fyri gildi av sjóvinnubrøvum, treytir fyri at fáa sjóvinnubrøv, hóast ásettu krøv ikki eru lokin til fulnar v.m.

Skiftisreglurnar í sjóvinnulógini um rættindi hjá teimum, sum hava eina útbúgving eftir gomlum reglum, eru nú skrivaðar í kunngerðini.

Av tí, at Føroyar ikki eru sjálvstøðugt limaland í IMO, men partur av danska limaskapinum, hevur nevndin mett tað rættast, at fylgja høvuðslinjunum í tí tilsvarandi donsku manningarlógini. Manningarlógin er nú tillagað føroysk viðurskifti har hetta letur seg gera sambært konvensjónsásetingum og hvar hetta ikki ávirkar líkastillingsavtaluna um sjóvinnubrøv millum Føroyar og Danmark.

Mett verður, at tað er rætt at ásetа tann partin av verandi sjóvinnulóg, sum viðvíkur førleikakrøvum, treytir fyri útgávu av sjóvinnubrøvum og treytir fyri mynstring í eina kunngerð. Grundgevingin fyri hesum er, at bæði førleikakrøv og treytir fyri mynstringar eru útsettar fyri ábaldandi broytingum sum fylgja av tillagingum frá altjóða konvensjónum og ynskjum frá tí føroysku vinnuni. Við hesum er tað lættari at ganga komandi krøvum og ynskjum á møti.

Altjóða sáttmálin um útbúgvingar, sjóvinnu og vaktarhald á fiskiskipum, STCW-F-sáttmálin, bleiv gjørdur í 1995. Hesin er tó ikki komin í gildi enn altjóða, men uppskotið til manningarlógina inniheldur tær ásetanir, sum konvensjónin hevur. Hesin sáttmálið er eisini lagdur fyri løgtingið til samtykt.

Viðmerkingar til tær einstøku greinarnar í lógini

Til § 1

Av tí at tað er møguligt at hava eitt skip dupultskrásett, t.v.s. bæði í Føroyum og í einari útlendskari skipaskrá (barebout-skráseting) er neyðugt at gera greitt, at lógin bert fevnir um skip undir føroyskum flaggi.

Til § 2

ad 2) Allýsingin av einum fiskiskipi er nú í samsvar við skipaskrásetingarlógina.

ad 6) Í ivamálum um eitt skip skal metast sum stuttleikafar, tekur Sjóvinnufyrisitingin avgerð um hetta eftir tilmæli frá Skipaeftirlitinum.

ad 7) Einki sjóøki í Føroyum uttanfyri havnir verður roknað sum vart sigliøki eftir hesi lóg. Tá tahan er um at onkur hevur upptjent siglingstíð í einum vardum sjóøki í einum øðrum landi, verður hetta viðgjørt í hvørjum einstøkum føri og í samráð við sjóvinnumyndugleikarnar á staðnum.

ad 8) Allýsingin umfatar tær átekningar á sjóvinnubrøv, sum eru gjørdar samsvarandi tí altjóða STCW-sáttmálanum (Standards of training, Certification and Watchkeeping for Seafarers, 1978 as amended in 1995).

ad 9) Allýsingin er innførd fyri, at Føroyar kann staðfesta STCW-F sáttmálan (Standards of Training, Certification and Watchkeeping for Fishing Vessel Personnel, 1995).

ad 10) Allýsingin er gjørd í samsvar við lógina um uppmáting av skipum. Skiftisreglurnar í tí altjóða sáttmálanum um uppmáting av skipum gingu út tann 18. juli 1994.

ad 13) Sigliøkið verður roknað frá grundlinjuni, sum ásett er í lógini um vinnuligan fiskiskap.

ad 14) Sama sum ad. 13.

Til § 3

Ásetingin er tann sama sum § 3 í galdandi manningarlóg.

Til § 4

ad 1) Ásetingin er, við onkrari umskriving, samsvarandi § 4, stk. 1 í verandi manningarlóg.

ad 2-3) Ásetingin er, við onkrari umskriving, samsvarandi § 10 í verandi manningarlóg.

ad 3-4) Ásetingin er tann sama sum § 4, stk. 2 og 3 í verandi manningarlóg.

Til § 5

ad 1) Frumritið av einum sjóvinnubrævi skal altíð vera umborð. Hetta er í samsvar við STCW-sáttmálan. Ásetingarnar í talvunum eru í samsvar við broytta STCW-sáttmálan. Nýtt sjóvinnubræv er komið inn, sum eitur vakthavandi maskinyvirmaður. Maskinstjórin á fiski- og handilsskipum við framtøkumegi millum 750 og 2999 kW í altjóða sigling, skulu hava sjóvinnubræv sum skipsmaskinistur á 1. stigi. Hetta forðar tó ikki fyri, at teir, sum hava eitt sjóvinnubræv sum skipsmaskinistur á 2. stigi og hava maskinistroyndina, at virka sum skipsmaskinstjórar á fiskiskipum við framtøkumegi upp til 1499 kW. Treytin fyri hesum er tó, at teir hava minst 2 ára maskintænastu á skipum við framtøkumegi 750 kW ella størri.

ad 2) Hendan áseting er tann sama sum § 6, stk. 2 í verandi manningarlóg.

ad 3) Sambært broytingunum í STCW-sáttmálanum eru tey áður settu mørkini 200 BRT og 1600 BRT broytt til ávikavist 500 BT og 3000 BT.

Tað at Sjóvinnufyrisitingin kann økja ella minka um førleikakrøvini er gjørt við atliti til tey broyttu tonsatølini. Við hesum kann Sjóvinnufyrisitingin byrgja fyri, at persónar, sum høvdu skiparaaettindi (upp til 1600 BRT) treytaleyst kunnu fáa nógv størri rættindi á t.d. skipum, sum føra vandamiklan farm.

ad 4) Ásetingin er innført sum avleiðing av broytingunum í STCW-sáttmálanum. Átekningin, ella viðurkenningarváttanin, á tey útlendsku sjóvinnubrøvini, verður gjørd á tey sjóvinnubrøv, sum eru útgivin eftir teimum nýggju reglunum í STCW-sáttmálanum.

ad 5) Ásetingin í STCW-F-sáttmálanum krevur somuleiðis, sum í STCW-sáttmálanum, at sjóvinnubrøv skulu hava eina átekning sambært sáttmálanum. Ásetingin ger tað møguligt, at kunna gera hetta umsitingarliga, tá ið STCW-F sáttmálin kemur í gildi altjóða.

Til § 6

Ásetingin er gjørd sum avleiðing av, at gingið verður yvir til at nýta tu globalu neyð- og trygdarskipanina GMDSS, sum skal vera fult gjøgnumført innan 1. februar 1999.

Til § 7

Kravið um at tað skal vera ein kokkur við skipum, sum hava eina manning uppá 8 ella størri, er hú komið inn aftur í lógina, eftir at tað varð tikið úr verandi manningarlóg í 1988, tá ið lógin varð gjørd.

Til § 8

ad 1) Ásetingin er broytt í mun til verandi manningarlóg. Siglloykini eru broytt frá Heimasigling og Altjóða sigling til ávikavist Strandasigling og sigling uttanfyri Strandasigling. Eingi sjóvinnubrøv verða givin til stuttleikaskip, men í førum hvar sjóvinnubrøv verða krevd, verða hesi krevd sambert reglunum fyri fiskiskip og handilsskip.

ad 2) Ásetingin er tann sama sum § 11, stk. 2 í verandi manningarlóg.

ad 3) Ásetingin er broytt í mun til verandi manningarlóg. Framtøkumegin 600 kW er broytt til 750 kW. Grundgevingin fyri hesum er tann, at eitt skip, sum hevur eina framtøkumegi undir 750 kW ikki verður umfatað av teimum altjóða sáttmálunum innan maskinøkið, men bert av tjóskaparligu lóggávuni.

ad 4) Ásetingin er tann sama sum § 11, stk. 4, bert tilvísingin til § 4, stk. 2 er broytt til § 4, stk. 4.

ad 5) Ásetingin, um at landsstýrið kann áseta forleikakrøv er broytt til, at Sjóvinnufyrisitingin kann áseta forleikakrøv. Hetta er í samsvar við manningarlógina.

Til § 9

Ásetingin er, við smærri umskriving, tann sama sum § 12, stk. 3 í verandi manningarlóg.

Til § 10

ad 1) Sum avleiðing av teimum nógvu broytingunum í útbúgvingarkrøvunum í seinastuni og eisini sum avleiðing av væntandi broytingum frá altjóða sáttmálum, er tað mett rættast, at broytingarnar kunna setast í verk umsitingarliga, so hvørn sum útbúgvingarkrøvini verða broytt. Hetta verður gjørt í samráð við avvarandi myndugleikar og sjómanna- og reiðarafelagini.

ad 2) Ásetingin er ein samanskriving av § 25 í verandi sjóvinnulóg og § 15, stk. 1 í verandi manningarlóg. Sambært hesum kann Sjóvinnufyrisitingin áseta forleikakrøv til skipanir við fiskiskipum og frítíðarførum undir 20 tons og krøv til maskinmanningina á hesum skipum.

ad 3) Ásetingin er, saman við 2. stykki, í samsvar við § 15, stk. 1 í verandi manningarlóg.

Til § 11

ad 1) Krøvini til at fáa sjóvinnubrøv hava higartil verið ásett í bæði sjóvinnulógini og í tilhoyrandi kunngerðum.

Tað er mett rættast, at áseta hesi krøv umsitingarligt og samla allar verandi ásetingar í eina kunngerð. Við hesum skuldi tað verið lættari at gjørt broytingar í takt við broytingar í altjóða sáttmálum, sum vit eru bundnir at, og ynskjum frá føroysku vinnuni.

Sum nýtt krav er sett, at viðkomandi ikki skal vera undir verjumáli, fyri at kunna fáa sjóvinnubrøv.

ad 2) Kravið um at ein við førararættindum skal hava føroyskan/danskan heimarætt er tað sama sum í §§ 4, 6 og 9 í verandi sjóvinnulóg og § 6 a, stk. 2 í verandi manningarlóg.

Sambært hesum stykki verður nú heimilað landsstýrismanninum í sjóvinnumálum at víkja frá kravinum um heimarætt. Hetta kann gerast í serligum føri og í samráð við reiðara- og sjómannafelagini.

Sambært STCW-sáttmálanum, skal landsstýrismaðurin tó tryggja sær, at viðkomandi fær innføring í viðkomandi føroyska lóggávu og at viðkomandi málsliga kann samskifta við manningina.

Til § 12

ad 1-2) Ásetingin er í samsvar við § 1 í verandi kunngerð um sjóvinnubrøv og serlig útbigvingarkrøv.

ad 3) Ásetingin er, við onkrari umskriving, tann sama sum í § 24, stk. 2 í verandi sjóvinnulóg. Her er tó skoytt uppí, at teir sum skulu hava fyrsta sjóvinnubræv og samstundis hava eitt prógv, sum er eldri enn 5 ár, koma undir somu reglur sum teir, ið ikki hava siglt tey seinastu 5 árini.

ad 4) Ásetingin tryggjar heimild fyri at áseta reglur fyri áteking á útlendsk sjóvinnubrøv og sertifikatir í samsvar við ásetingunum í tí broytta STCW-sáttmálanum.

Til § 13

Ásetingin er tann sama sum § 28 í sjóvinnulógini. Her er tó skoytt uppí, at »inkompitansa« er eisini ein grundgeving fyri at kunna taka aftur eitt sjóvinnubræv.

Til § 14

Ásetingin er tann sama sum § 29 í sjóvinnulógini.

Til § 15

Ásetingin er tann sama sum § 30 í sjóvinnulógini. Afturtikin sjóvinnubrøv skulu tó innlatast til Sjóvinnufyrisitingina, sum vegna landsstýrið, hevur hesi í varðveitslu.

Til § 16

Ásetingin er, við onkrari umskriving, tann sama sum § 31 í sjóvinnulógini. Her er tó skoytt uppí, at rætturin til at fáa førararættindi aftur er ikki treytaleysur. Um viðkomandi ikki hevur siglt tey seinastu 5 árini, verða somu reglur at galda, sum ásett er í § 12, stk. 4, í uppskotinum til hesa lóg.

Til § 17

Ásetingin í hesi grein má metast sum ein tíðandi partur av tí broytta STCW-sáttmálanum. Álagt verður reiðarum fleiri týðandi skyldur, sum beinleiðis hava við trygdina at gera umborð.

Í 2. stykki er møguleikin opnaður fyri umsitingarligt at kunna áseta nærri reglur um hetta.

T. d. kann nevnast, at sambært STCW-sáttmálanum eru samskiftiskrøvini umborð gjørd strangari fyri ferðamannaskip enn fyri onnur handilsskip.

Reiðarin vil við hesum verða bundin til at geva skiparanum nakrar instruksir. Av hesi orsøk er tað mett rættast, at láta skiparan verða umfataðan av hesum somu ábyrgdarreglum, sjálvt um sáttmálin bert nevnir reiðaran sum ábyrgdarhavara.

Harafturat er tað mett rættast, at láta skiparar og reiðarar á øðrum skipum, sum ikki eru umfatað av STCW-sáttmálanum, t.d. fiskiskipum og frítíðarskipum, eisini at vera umfatað av somu ábyrgdarreglum.

Fleiri av teimum ásetingum, sum nevndar eru í stk. 1, hava ikki áður verið í teimum føroysku sjóvinnulógunum, men bert partvís í umsitingarligum reglum. Nevnast kann t.d. málkrav til manning umborð á ferðamanna- og lastaskipum, sum við heimild úr ríkislóg »lov om skibes sikkerhed« eru lýstar í tekniskari fyriskipan frá danska sjóvinnustýrinum.

Uppskotið inniheldur ikki eina allýsing av einum reiðara. Fyri at kunna staðfesta, hvør er reiðari, skal í fyrstu atløgu vera gingið eftir eigaraviðurskiftunum. Men onnur viðurskifti kunnu gera seg galdandi, t.d. at ein persónur ella felag kann hava rættin til at disponera yvir skipinum. Við hesum kann ein korrisponderandi reiðari ella ein bare-bout leigari, sum sjálvur setur manning, metast sum ein reiðari.

Til § 18

Ásetingin í hesi grein er, við onkrari umskriving, tann sama sum § 12 í verandi manningarlóg.

Til § 19

Ásetingin er tann sama sum § 13 í verandi manningarlóg.

Til § 20

Ásetingin er, við onkrari umskriving, tann sama sum § 14 í verandi manningarlóg. Tilvísingin til »bruttotons« er tó tikin úr, av tí at bruttotonsatalið er nú innført sum málieind í lógini. Ásetingin í hesi grein kann hóast alt bliva aktuell, t.d. um tað vísir seg at verða neyðugt at broyta málieinheitina fyri fiskiskip og minni skip frá bruttotons til longd í metrum.

Til § 21

ad 1) Ásetingin, um at Sjóvinnufyrisitingin kann í serligum føri økja ella minka um manningartalið á skipinum, er tann samsvarandi § 15, stk. 1 í verandi manningarlóg.

ad 2) Ásetingin er, við onkrari umskriving, tann sama sum § 15, stk. 2 í verandi manningarlóg.

Til § 22

Ásetingin er tann sama sum § 16 í verandi manningarlóg. Undantaksetingin kann eisini gerast á skip, sum gjøgnumgangandi munandi umbygging.

Til § 23

Ásetingin er, við onkrari umskriving, tann sama sum § 17 í verandi manningarlóg. Nevnast kann tó, at tað er mett rættast at innseta tær greinir, sum kunnu leggjast fyri Sjóvinnuráðið. Grundgevingin fyri hesum er, at fleiri av teimum avgerðum sum gjørdar verða við heimild úr verandi sjóvinnulóg og sum nú eru skrivaðar inn í uppskotið til manningarlógina, ikki kunnu leggjast fyri Sjóvinnuráðið.

Til § 24

Ásetingin svarar til § 18 í verandi manningarlóg. Tilvísingarnar til tær einstøku greinarnar eru í samsvar við fyriliggjandi uppskot til nýggja manningarlóg.

Av tí at reiðarans og skiparans ábyrgdarreglur eru komnar inn í uppskotið til lógina, verður revsifyriskipanin útbygd til eisini at umfata hetta.

Til § 25

Revsifyriskipanin fyri brot á reglurnar í § 17, stk. 1., 3., 4. og 5. stk. (reiðarans og skipurans ábyrgdarreglur) eru skerpaðar. Brot á lógina er her í samsvar við ríkislóg »lov om skibes sikkerhed«.

Sjálvt um hetta stykkið í ríkislógini ikki er sett í gildi fyri Føroyar, er tað mett rættast at innføra skerpaðar revsifyriskipanir til hesar, fyri á hendan hátt at kunna byrgja fyri einumhvørjum »insitamenti« til at bróta lógina við tí endamáli at slaka uppá trygdina umborð við atliti til at vinna sparingar.

Til § 27

Lógin eigur at fáa gildi skjótast gjørligt, av tí at broytingarnar í STCW-sáttmálanum eru settar í gildi altjóða tann 1. februar 1997.

Til § 28

ad 1) STCW-sáttmálin ásetur, at siglandi við handilsskipum skulu vera úthúgvin í samsvar við broytingunum í sáttmálanum í seinasta lagi 1. februar 2002.

Sjóvinnumyndugleikin skal ansa eftir hesum, tá ið tey gomlu sjóvinnubrøvini skulu skiftast út við nýggj sjóvinnubrøv.

Talan kann vera um, eitthvørt skeið, sum viðkomandi skal taka, fyri at fáa full rættindi sambært broytta sáttmálanum.

Í fylgisskjalinum til lógaruppskotið eru hesi viðurskifti útgreinað.

Reglurnar um endurnýggjan av sjóvinnubrøvum vilja eisini verða gjørdar við atliti til ásetingarnar í § 12, stk. 4 (ikki silgt 5 tey seinastu árini) í uppskotinum til lógina.

ad 2) Ásetingin er rættað móti nøkrum eldri skipum, sum bert eru máld upp í brutto-registurtonsum.

Til § 29

Ásetingin er tann sama sum § 21 í verandi manningarlóg.

Málið fall burtur sbr. stýrisskipanarlógini § 15 stk. 3, tí at løgtingsval var 30. apríl 1998, og málið ikki var liðugt viðgjørt á tingi fyri valið.

F.L. j.nr. 1601-1/90

94 Uppskot til løgtingslóg um ábyrgd fyri lánum til fiskamjøl og lýsi v.m. á goymslu

Ár 1998, hósdagin 5. mars, legði John Petersen, landsstýrismaður, vegna landsstýrið fram soljeðandi

Uppskot
til
løgtingslóg um ábyrgd fyri lánum til fiskamjøl og lýsi v.m. á goymslu

§ 1. Landsstýrismanninum í fiskivinnumálum er heimilað landskassans vegna í fíggjarárinum 1998 at veita óbeinleiðis borgan fyri lánum til fiskamjøl, lýsi, matsild og makrel á goymslu. Borgan verður givin fyri lánum ikki upp um 70% av lánsvirðinum.

§ 2. Henda lóg kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd, og fer úr gildi aftur 31. desember 1998.

Almennar viðmerkingar

Uppskotið er samsvarandi løgtingslóg nr. 42 frá 28. apríl 1997, sum fór úr gildi 31. desember 1997, sí løgtingsmál nr. 46/1996, og er uppskotið bert ein endurnýgging av lógini.

Danska fíggjarmálaráðið hevur í skrivi frá 23. februar 1996 boðað frá, at samsvarandi uppskot kunnu framyvir samtykkjast uttan góðkenning frá fíggjarmálaráðnum, um so er, at hesi innihaldsliga ikki víkja munandi frá hesum uppskoti, smb. pkt 4 í avtaluni við donsku stjórnina frá 28. mai 1993.

Tey virki, sum árini frammanundan hava biðið um borgan sambært lógini, viðgera í høvuðsheitum fiskasløg, hvørs veiða er nær tengd at árstíðum. Rávøruinnggldirnar eru sera ójavnar, og goymslan av lidnum vorum til tíðir stór og kapitalbindandi. Eitt av virkinum, sum árini frammanundan hevur umboðað meginpartin av

upphæddini til borganir, roknar við, at helmingurin av allari ársroynd kemur á virkið í mai og juni mánaða, meðan mjøli og lýsi skal brúkast og seljast yvir munandi longri tíð. Tí verður mett, at lógin hevur stóran týdning, soleiðis at rakstrarfígging til virkið kann viðgerast skjótari av peningastovnunum.

Fíggjarligur kostnaður
Í fíggjarárinum 1997 eru borganir veittar fyri 25 mió. kr., og mett verður, at borganir í fíggjarárinum 1998 verða áleið tær somu sum fyri 1997.

Víst verður annars til løgtingslóg nr. 36 frá 25. mai 1963, tá fyrsta lógin um goymslulán kom í gildi.

Viðmerkingar til tær einstøku greinarnar
Ad. § 1. Talan verður bert um at veita óheinleiðis borgan (simpla kautión) fyri lánum til fiskamjøl, lýsi, matsild og makrel á goymslu. Borgan verður givin fyri lánum, ið ikki mugu fara upp um 70 % av lánsvirðinum.

Ad. § 2. Lógin verður galdandi í fíggjarárinum 1998.

Málið fall burtur sbr. stýrisskipanarlógini § 15 stk. 3, tí at løgtingsval var 30. apríl 1998, og málið ikki var liðugt viðgjørt á tingi fyri valið.

F.L. j.nr. 1400-7/91

95 Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um stuðul til flutning av fiski

Ár 1998, hósdagin 5. mars, legði John Petersen, landsstýrismaður, vegna landsstýrið fram soljóðandi

Uppskot
til
løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um stuðul til flutning av fiski

§ 1.

Í løgtingslóg nr. 67 frá 13. juni 1995, um stuðul til flutning av fiski sum broytt við løgtigslóg nr. 112 frá 13. juni 1997 verður gjørd henda broyting:
Í § 1, stk. 2 verður orðingin: »Hetta er bert galdandi fyri bátar, ið eru heimahoyrandi á omanfyri nevndu plássum.« strikað.

§ 2.

Henda lóg kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

Viðmerkingar
Ætlanin við uppskotinum er at javnstilla fiskifør, sum leggja fisk upp í bygdum har eingin fiskakeypari er.

Ad § 1: Undir várróðrinum er vanligt, at fremmandir bátar rógva út frá Hiði, Funningsfirði, Hvannasundi v.m. Bátarnir úr bygdini fáa stuðul til at flyta veiðina til næmasta fiskakeypara, meðan fremandu bátarnir ikki fáa stuðul til at flyta veiðina til sama fiskakeypara.

Mettur kostnaður av broytingini: Fyri fíggjarárið 1997 eru kr. 184.000 úrgoldnar til flyta veiður til næmasta fiskakeypara. Allur flutningsstuðul fyri 1997 er ikki avgreiddur enn, endaliga talið verður tí nakað hægri.

Broytingin fer at gera skipanina við stuðli til flutning av fiski nakað dýrari, men tlt er at siga, hvussu mógv. vegna tað at flestu fiskiførini heldur flyta veiðuna til gólvuppboðspluha, framvið nærmasta fiskakeypara. Tað kundi tí hent, at dýrkanin av skipanini ikki verður tann stóra. Hinvegin er møguleiki fyri at skipanin dýrkar munandi.

Viðmerkjast skal, at fyri figgjarárið 1997 eru smb. somu lóg kr. 1.349.000 útgoldnar til at flyta fisk frá uppboðssølu til virkingar á økjum, har firðir ella sund skilja. Allur flutningsstuðul fyri 1997 er ikki avgreiddur enn, og endaliga talið verður tí nakað hægri.

Fiskivinnu Starvsnevndin hevur tann 24. februar 1998 viðgjørt málið, og tekur undir við uppskotinum.

Málið fall burtur sbr. stýrisskipanarlógini § 15 stk. 3, tí at løgtingsval var 30. apríl 1998, og málið ikki var liðugt viðgjørt á tingi fyri valið.

F.L.j.nr. 1500-13/91

96 Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um minstuløn og dagstudning

Ár 1998, hósdagin 5. mars, legði John Petersen, landsstýrismaður, vegna landsstýrið fram soljóðandi

Uppskot
til
løgtingslóg um broytlng í løgtingslóg um minstuløn og dagstudning

§ 1.

Í løgtingslóg nr. 32 frá 27. mars 1992 um minstuløn, dagstudning og minstaforvinning sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 12 frá 5. februar 1998 verða gjørdar hesar broytingar:

1) Har orðið »Lønjavningargrunnurin« kemur fyri í lógini, verður orðið: »Lønjavningarstovan« sett ístaðin.
2) Í § 1, stk. 1 verður orðingin »og vinna á føroyskum fiskiførum« broytt til: »og vinna á fiskiførum skrásett í Føroyum«.
3) § 3, stk. 2 verður orðað soleiðis:
»Stk. 2. Fiskimenn, við fiskiskipum á føroysku landleiðunum, sum eru uudir fiskidagaskipanini, kunnu í eintum fiskiári ikki fáa minstuløn fyri fleiri dagar, enn avvarðandi skip hevur fingið tillutað av fiskidøgum sambært lógini um vinnuligan fiskiskap fróknað umsettum og umbýttum fiskidøgum.«
4) § 7, stk. 3 verður orðað soleiðis:
»Stk. 3. Heimilað verður landsstýrismanninum í fiskivinnumálum at áseta í kunngerð nærri reglur um manningargongdir v.m. til tess at útinna hesa lóg.«

§ 2.

Henda lóg kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

Viðmerkingar

Ad 1) Víst verður til løgtingsmál nr. 92/1997 um broyting í løglingslóg um Lønjavningargrunn. Mælt verður til at orðið »Lønjavningargrunnurin« verður broytt til »Lønjavningarstovan«.

Ad 2) Broytingin tryggjar, at manningar á føroyskum fiskiskipum, sum flagga út sambært kunngerð nr. 124 frá 20. juli 1997 um leiguskráseting av skipum (Bareboat Carter) koma undir skipanina við minstuløn og dagstudningi.

Ad 3) Broytingin tryggjar, at manningar á skipum, sum ikki eru undir fiskidagskipanini, t.d. djúpvatns trolarar, koma undir skipanina við minstuløn og dagstudningi, tá fiskað verður á føroysku landleiðunum.

Ad 4) Viðmerking til broytingina í § 7, stk. 3: Í galdandi løgtingslóg um minstuløn og dagstudning er tað lønjavningargrunnurin, sum »...setir í reglugerð tær gjøllaru reglurnar fyri minstuløn og hinum stuðlunum. Reglugerðin verður at senda landstýrinum til góðkennigar.« Við nýggju stýriskipanarlógini, har einstaki landsstýrismaðurin hevur ábyrgdina av sínum málsøkjum, er tíðin farin frá hesi mannagongd. Mælt verður tí til, at heimildin til at áseta gjøllari reglur, verður givin landsstýrismanninum.

Kostnaður av broytingini er ongin, av tí at ætlanin alla tíðina hevur verið, at allir skuldu hava rætt til minstuløn og dagstudning.

Fiskivinnu Starvsnevndin hevur 24. februar 1998 viðgjørt málið, og tekur undir við uppskotinum.

Málið fall burtur sbr. stýrisskipanarlógini § 15 stk. 3, tí at løgtingsval var 30. apríl 1998, og málið ikki var liðugt viðgjørt á tingi fyri valið.

F.L.j.nr. 1500-17/91

97 Uppskot til løgtingslóg um Vinnugrunn

Ár 1998, hósdagin 5. mars, legði Eilif Samuelsen, landsstýrismaður, vegna Ivan Johannesen, landsstýrismann, vegna landsstýrið fram soljóðandi

Uppskot
til
løgtingslóg um Vinnugrunn

§ 1. Settur verður á stovn Vinnugrunnur at stuðla tiltøkum til menning av fiskaðar- og tænastufyritøkum.

§ 2. Grunnurin er undir eftirlitið landsstýrismansins í vinnumálum.

§ 3. Grunnurin verður fyrisitin av einum av landsstýrismonnunum tilnevndum stýri við 5 limum. Stýrið verður valt fyri 4 ár. Stýrið skipar seg sjálvt við formanni.
Stk. 2. Landsstýrismaðurin ásetir nærri reglur í kunngerð um umsiting grunsins.

§ 4. Grunnur til fiskaðarfremjandi endumál, sum varð settur á stovn sum eksternur grunnur við § 3, stk. 1, nr. 7 í løgtingslóg nr. 33 frá 27. mars 1992 um avtøku av landskassagrunnum, verður avtikin, og fíggjarstøða grunsins verður flutt Vinnugrunninum, og er hetta stovnsfe grunsins saman við játtanum á fíggjarløgtingslógum.

§ 5. Grunnurin kann veita stuðning til fylgjandi.
1. Framleiðslumenning
2. Sølumenning
3. Leiðslumenning og útbúgvingar
4. Gransking, kanningar v.m.

Stk. 2. Landsstýrismaðurin ásetur nærri reglur og treytir fyri stuðulsveitingum.

§ 6. Roknskaparár grunsins er almanakkaárið.
Stk. 2. Roknskapirnir samtøkt stk. 1 verða grannskoðaðir av løggildum grannskoðara.
Stk. 3. Grannskoðaðu roknskapirnir verða sendir landsstýrismonninum við frágreiðing og viðmerkingum frá stýrinum fyri grunnin.

§ 7. Grunnurin eru leysur av øllum skatti og avgjøldum til land og kommunu.

§ 8. Henda lóg kemur í gildi tann 1. juli 1998, og samstundis fer úr gildi § 3, stk. 1, nr. 7 í løgtingslóg nr. 33 frá 27. mars 1992 um avtøku av landskassagrunnum.

Almennar viðmerkingar
Grunnurin til íðnaðarfremjandi endamál varð fyrstu ferð umrøddur á fíggjarløgtingslógini 1982/83. Áðrenn hetta, hevði ein játtan staðið á fíggjarløgtingslógunum við heitinum »stuðul til íðnaðarfremjandi endamál«. Viðmerkingarnar til fíggjarløgtingslógina í 1982/83 vóru, at »játtanin, saman við avlopi frá 1981/82, verða umløgd til grunn, sum landsstýrið saman við fíggjarnevndini kann ráða yvir«.

Tá flest allir grunnar vórðu avtiknir við lóg í 1992, vórðu einstakir grunnar við lóg gjørdir eksternir, tó uttan ein hevði lýst hugtakið »eksternur« nágreiniliga. Grunnur til íðnaðarfremjandi endamál varð gjørdur eksternur. Fyrstu ferð hugtakið »eksternur« varð vael lýst, var í løgtingsmáli nr. 112 um avtøku av landskassagrunnum, lagt fram fyri ting á várið 1997.

Ein eksternur grunnur hevur hesi eyðkenni:

- Grunnurin er ikki tikin við í fíggjarstøðu landskassans, og hevur sjálvstøðugan roknskap.
- Grunnurin hevur stýri og umsiting.

Fíggjarstøðan hjá grunninum til íðnaðarfremjandi endamál er ikki tikin við í fíggjarstøðu landskassans, men grunnurin hevur hinvegin ongantíð lokið treytirnar um stýri og umsiting. At stovnseta ein grunn í einari avtøkulóg, har heimildir grunsins ikki verða ásettar, er eisini óheppið. Lógaruppskotið er ætlað at skapa eitt veruligt lógargrundarlag fyri grunnin.

Grunnurin er vorðin umsitin av landsstýrismanninum í vinnumálum og hevur Menningarstovan gjørt tilmæli til landsstýrismannin, sambært kunngerð fyri grunnin. Ein tvífald umsiting er farin fram, tó kann lýsast soleiðis:

Menningarstovan fær umsókn frá einari fyritøku. Menningarstovan viðger umsóknina sambært kunngerð nr. 14 frá 18. februar 1997 og reglugerð fyri grunnin, og ger síðani eitt tilmæli til Vinnumálastýrið. Umsókn og tilmæli verða viðgjørd í Vinnumálastýrinum, og eitt innanhýsis tilmæli verður gjørt til landsstýrismannin í vinnumálum, og er hetta tilmælið ofta eins og tað, sum kemur frá Menningarstovuni.

Tá Menningarstovan fær uppgerð yvir útreiðslur av verkætlanum, til hvørs studningur er vorðin játtaður, verður henda send Vinnumálastýrinum til ávísingar. Vinnumálastýrið sendur síðani útreiðsluskjalið til ávísingar á Gjaldstovuni og boðar móttakara og Menningarstovuni frá hesum. Henda tvífalda mannagongdin er óheppin, bæði fyri Menningarstovuna og Vinnumálastýrið.

Við hesum fyri eyga er gjørt av at endurskoða lógargrundarlagið fyri grunnin til íðnaðarfremjandi endamál, soleiðis, at grunnurin veruliga verður ein eksternur grunnur uttan beinleiðis ávirkan frá landsstýrismanninum.

Úrslit higartil av studli til íðnaðarfremjandi endamál
Higartil hava góð úrslit verið av studningi úr verandi grunni. Skipað hevur verið fyri felags luttøku á útlendskum framsýningum og av samskipaðum framsýningum í Føroyum, við studli úr grunninum.

Studningur hevur eisini, við góðum úrslitum, verið veittur til vøru- og framleiðslumenning. Studlaði marknaðarføringstiltøk hjá føroyskum fyritøkum uttanlands at bendu á góð úrslit. Úrslit av luttøku hjá einstøkum fyritøkum á útlendskum framsýningum, eru ikki altmenn, men eftirmetingarnar siga, at fyritøkurnar í allar flestu førum hava fingið ynsktu sambondini, og ynskja at byggja tey víðari upp við nýggjari luttøku.

Harða altjóða kappingin setir stór krøv til útbúgving. Higartil hevur grunnurin ikki veitt so nógvan studning á hesum øki, sum ætlað varð. Í sambandi við góðskustýringarskipanir, ið longu hava stóran týdning í kappingini, tykist gongd verða komin á. Neyðugu upphyggingina av frátøkum í verandi innanmentirlitsskipan hevur grunnurin studlað.

Fíggjarviðurskifti

Á talvuni niðanfyri sæst hvussu studningur er játtaður til tey einstøku endamálini tey seinasti árini. Grunnurin hevur sertiga játað studning til sølumennandi tiltøk. Samanlagt eru 81 sølutiltøk stuðlað síðani 1993 við samanlagt 12,7 mió. kr., og í miðal er tað 157 tús. kr. til hvørt sølutiltak.

Talva 1.	1993	1994	1995	1996	1997	Stuðlað tiltøk samanlagt
1. Framleiðslumenning	100.000	584.200	2.505.300	1.748.600	1.019.220	24
2. Sølumenning	1.760.444	1.457.370	944.684	3.427.069	5.150.844	81
3. Leiðslumenning og úthúgvingar	300.000	500.000	-	114.400	1.064.820	7
4. Gransking, kanningar v.m.	540.000	-	204.963	604.793	-	10
Samanlagt	2.700.444	2.541.570	3.654.947	5.894.862	7.234.884	

Roknskapur:
Fíggjarstøða grunsins tann 31. desember 1997 var hendan:

Virði	
Útlán	4.814.309,- kr
Bankabók í Føroya Banka	3.959.497,- kr
Millumrokning við landskassan	5.227.915,- kr
Samanlagt	14.001.721,- kr

Eginogn	
Saldo 1. jan 1997	13.628.245,- kr
Úrslit í árinum	373.476,- kr
Samanlagt	14.001.721,- kr

Viðmerkjast skal, at grunnurin ikki veitir lán longur smb. reglugerð, og roknskapurin verður uppgjørdur sum útgoldin studningur og ikki játtaður studningur.

Menningarstovan hevur gjøgnumgingið játtanirnar, og metir, at uml. 500.000 kr. eru tøkar til stuðul, umfrant játtan á fíggjarlógini fyri 1998 uppá 4.163 mió. kr.

Fíggjarligu avleiðingarnar av uppskotinum eru ongar. Grunnurin yvirtekur fíggjarstøðuna og skyldurnar (játtaður studningur) hjá grunninum til ídnaðarfremjandi endamál.

Viðmerkingar til einstøku greinirnar

Ad § 1. Grunnurin skal stuðla tiltøkum sum kunna hava týdning fyri menningina av tí føroyska vinnulívinum og búskapinum, herundir eisini tilltøk, ið annars hava ringar møguleikar fyri at verða framd, tí fíggjarligi og tøkniligi váðin er stórur.

Ad § 2. Hetta orðaljóð er í samsvar við reglurnar um ráðharraábyrgd, soleiðis at talan er um landsstýrismannin og ikki landsstýrið sum so.

Ad § 3. Landsstýrismaðurin velur eitt stýri. Stýrið eigur at verða mannað við fólki, sum hava innlit í vinnulív, búskap og almenna fyrisiting. Fyri ikki at gera umsitingina ov fløkta, eigur umsitingin av grunninum at verða flutt til Føroya Ídnaðargrunn, sum eisini hevur aðrar grunnar um hendi.

Ad § 4. Grunnurin til fdnaðarfremjandi endamál verður niðurlagdur, og liggjarstøðan, sum javnvigar við 14 mió. kr., harav ogn er bankabók í Føroya Banka áljóðandi 3,95 mió. kr., útlán áljóðandi 4.8 mió. kr. og millumrokning við landskassan uppá 5.2 mió. kr., verða fluttar hesum grunni.

Ad § 5. Grunnurin veitur bert studning. Viðgerðin av einari umsókn eigur at krevja eina nágreiniliga uppseting av verkætlanini, sum er í samsvar við eina reglugerð, sum verður gjørd í tráð við lógina og kunngerðina fyri grunnin. Studningur eigur at veitast til fylgjandi tiltøk, samsvarandi galdandi kunngerð og reglugerð fyri grunnin til fdnaðarfremjandi endamál.

1. **Framleiðslumenning**
   1.1. Vørumenning: Studning til menning av nýggjum vørum og tænastum og til menning av verandi vørum og tænastum.
   1.2. Menning av nýggjum framleiðsutólum og framleiðsluhættum v.m: Studning til menning av nýggjum framleiðslutólum og -hættum ella tólum, sum ikki áður hava verið framleidd í Føroyum, herundir eisini menning av skipanum til stýring av framleiðslu, góðsku v.m.

2. **Sølumenning**
   2.1. Søluroyndir, sølufremjandi tiltøk og marknaðarkauning: Studning til tiltøk sum fremja føroyskan útflutning
   2.2. Tilevning av sølutilfari: Studning til virkir sum gera sølutilfar fyri teirra framleiðslu/tænastur.
   2.3. Sølufram sýningar: Studning til tiltøk á vørufram sýninginum uttanlands v.m. ella fyriskipan av vørufram sýningum í Føroyum.

3. **Leiðslumenning og úthúgvingar**
   3.1. Útbúgving innan sølu og leiðslu: Studning til serligar útbúgvingar, sum ikki er at rokna sum vanligar útbúgvingar og skeið.
   3.2. Góðskustýring: Studning til menning av góðskustýring.
   3.3. Nýstovnað virki: Studning til at útbúgva starvsfólk á nýstovnaðum virkjum, har framleiðslan ikki finst í Føroyum frammanundan.

4. **Gransking, kanningar v.m.**
   4.1. Kanningararbeiði og verkætlanir: Studning til kanningararbeiði og verkætlanir sum eru áhugaverd at fremja.
   4.2. Patentumsóknir: Studning til áhugaverdar patentumsóknir.

Ad § 5, stk. 2. Landsstýrismaðurin fyri avvarðandi øki hevur heimild at áseta í kunngerð nærri reglur og treytir fyri studningsveitingum, og skulu hesar liggja til grund fyri viðgerð av umsóknum.

Ad § 6. Grunnurin skal á hvørjum ári leggja grannskoðaðan roknskap saman við frágreiðing um virksemi í undanfarna ári fyri landsstýrismannin.

Ad § 7. Grunnurin skal ikki rinda skatt ella avgjøld til landskassan av ogn sini.

1. viðgerð fríggjadagin 13. mars 1998. Uppskotið varð beint í vinnunevndina.

Málið fall burtur sbr. stýrisskipanarlógini § 15 stk. 3, tí at løgtingsval var 30. apríl 1998, og málið ikki var liðugt viðgjørt á tingi fyri valið.

Fl. j.nr. 1218-1/90

98 Uppskot til ríkislógartilmæli um at seta í gildi fyri Føroyar »Anordning om ikrafttræden for Færøerne af lov om beskyttelse af havmiljøet«

Ár 1998, hósdagin 5. mars, legði Eilif Samuelsen, landsstýrismaður, vegna landsstýrið fram soljóðandi

Uppskot
til
ríkislógartilmæli um at seta í gildi fyri Føroyar »anordning om ikrafttræden for Færøerne af lov om beskyttelse af havmiljøet«

Mælt verður ríkismyndugleikunum til at seta í gildi fyri Føroyar hjálagda uppskot til kongliga fyriskipan um »Anordning om ikrafttræden for Færøerne af lov om beskyttelse af havmiljøet« við broytingum landsstýrisins.

Almennar viðmerkingar
a) Galdandi lóggáva
Galdandi lóg um vernd av havumhvørvinum er ríkislóg nr. 130 frá 9. apríl 1980 (om beskyttelse af havmiljøet), sum er sett í gildi í Føroyum við kongligari fyriskipan nr. 318 frá 26. juni 1985.

Eftir kgl. fyriskipanini er eftirlitið innan føroyska fiskimarkið og í føroyskum havnum lagt til Føroya Landsstýri. Fráboðanir um havdálking skulu fráboðast til landsstýrið, og landsstýrið hevur ábyrgdina av at basa dálking á føroyskum havøki innan fiskimarkið. Nakrar heimildir eru í danska umhvørvismálaráðnum, serliga veitan av loyvum til dumping (t.d. søkking av skipum) og loyvum til útleiðing í hav frá borivirksemi, frálandavirkni o.t.

Í kunngerð nr. 20 frá 8. apríl 1987 er álagt kommununum at hava móttøkuskipanir fyri oljurestir og -blandingar, kloakk og burturkast í føroyskum havnunum. Vaktar- og Bjargingartænastan hevur eftirlitið við, at kommunurnar halda sínar skyldur eftir kunngerðini.

Við undantak av omanfyri nevndu kunngerð um móttøkuskipanir í føroyskum havnum eru ongar av teimum kunngerðum, sum eru settar í gildi í Danmark við heimild í lógini, lýstar at galda í Føroyum. Í Danmark er komin nýggj havumhvørvislóg, nr. 476 frá 30. juni 1993, við seinni broytingum.

Endamálið við havumhvørvislógini frá 1980 var at liða reglurnar í ymsum altjóða sáttmálum um havdálking frá skipum, m.a. MARPOL-konventiónina. Altjóða havumhvørvissamstarvið gjøndi tað neyðugt við eini dagførdari lóg um vernd av havumhvørvinum, tí neyðugt er, at reglurnar um dálking av havumhvørvinum frá skipum og øðrum virksemi eru so eins sum gjørligt í teimum ymsu londunum.

Í Føroyum eru lýstar at galda fylgjandi altjóða sáttmálar um verju av havumhvørvinum:

Konventión nr. 96 frá 8/10 1984 um fyribyrging av dálking frá skipum.

Konventión nr. 35 frá 3/4 1974 (Oslo) um havdálking og útblaking frá skipum og flogførum.

Konventión nr. 15 frá 6/2 1976 (London) um havdálking og dumping.

Konventión nr. 3 frá 1/1 1980 (Paris) um havdálking frá landi av.

Konventiðu frá 16. september 1971 millum Danmark, Finland, Ísland, Noreg og Svøríki (København-aftalen) um fyribyrging av olju- og kemikalieudálking av havinum. Sáttmálin er góðkendur av løgtinginum í løgtingsmáli 42/1991, men sáttmálin er ikki lýstur enn.
Í samband við løgtingsmál nr. 5 /1993 um lóg um leiting eftir oljut og gassi á føroyskum øki varð álagt, at arbeiðssetningurin hjá oljuráðleggingarnevndini eisini skuldi vera at gera uppskot til lóg og kunngerðir viðvíkjandi oljudálking av havumhvørvinum.

Oljuráðleggingarnevndin boðaði í skrivi til Føroya landsstýri tann 11. mars 1996 frá, at hon metti, at havdálking frá boripallum og umsiting av umhvørvisreglum fyri útleiðing frá boripallum átti ikki at vera viðgjørt í oljuhøpi einans, tí slík mál eru tvørgangandi og hoyra tí av røttum heima í umhvørvislóggávuni og hjá umhvørvismyndugleikunum.

Landsstýrið tók undir við hesum sjónarmiði og avgjørdi at seta ein arbeiðsbólk.

Manningin í arbeiðsbólkinum var hendan:
Jacob Pauli Joensen frá Heilsufrøðiligu Starvsstovuni,
Eilif Gaard frá Fiskirannsóknarstovuni,
Djóni Weihe / Jóan Karl Høgnesen frá Vaktar- og Bjargingartænastuni,
Arne Nørrevang frá Oljuráðleggingarnevndini,
Herálvur Joensen frá Oljufyrisitingini,
Jalgrim Hilduberg og Tine Wilsøe hava verið skrivarar hjá arbeiðsbólkinum.

Arbeiðsbólkurin gjørdi uppskot um, hvørjar kunngerðir eiga at koma í gildi fyri føroyska økið umframt at koma við uppskoti um fyrisitingar- og eftirlitsskipan.

Haraflurat kom bólkurin at gera viðmerkingar til danska uppskotið til nýggja kgl. fyriskipan innan havumhvørvið.

Landsstýrismaðurin hevur verið í samband við ríkisumboðsmannin viðvíkjandi spurninginum um at fáa donsku havumhvørvislógina, nr. 476 frá 30. juni 1993 við seinni broytingum, setta í gildi fyri Føroyar, og tók arbeiðið hjá arbeiðsbólkinum støði í hesi lóg.

Álit varð latið landstýrismanninum 26. september 1997.

b) Samandráttur av nýskapanini við uppskotinum
Í mun til galdandi kgl. fyriskipan um havumhvørvið frá 1985 er uppskotið ein endurskoðan samsvarandi donsku havumhvørvislógini frá 1993 við seinni broytingum.

Sambært uppskotinum eru allar heimildir innanfyri føroysku fiskimarkið lagdar til Føroya Landsstýri at fyrisita.

Nýtt í hesum sambandi er, at fyrisitingin av útleiðingartoyvum frá borivirksemi o.l. er eftir galdandi fyriskipan hjá danska umhvørvismálaráðnum, meðan alt eftirlit er hjá Føroya Landsstýri.

Í nýggja uppskotinum er ásetanin av treytum fyri útleiðingum, tað sum kann samanberast við umhvørvisgóðkenningar, eisini lagt til føroyskar myndugleikar at umsita.

Sama er við veitan av loyvum til dumping. Tó er dumping avmarkað til træskip og fram til ár 2004, sum er í tráð við reglurnar í OSPAR-konventiónini

Burtursæð frá ávísum tillaðingum orsakað av, at landsstýrið hevur myndugleikan innanfyri føroyska fiski-

markið, er kgl. fyriskipanin lík teirri donsku havumhvørvislógini. Uppskotið er formað soleiðis, at innanfyri føroyska fiskimarkið er tað Landsstýrið ella stovnar, sum landsstýrið hevur heimilað til tess, sum hava fyrisitingina av góðkenningum, eftirliti v.m.

Tá nýggja kgl. fyriskipanin, saman við kunngerðum, er sett í gildi fyri Føroyar, er føroyska løggávan innan havumhvørvið samsvarandi tí donsku. Føroyar kunnu tá lúka somu konventiónir, sum Danmark hevur ratificerað, t.d. OSPAR.

c) Fíggjarligur kostnaður av uppskotinum
Nakran størri kostnað hevur landskassin ikki havt av verandi fyriskipan um vernd av havumhvørvinum.

Við broytingunum í hesi kgl. fyriskipanini, har fleiri kunngerðir verða settar í gildi, samstundis sum ætlanir um at fara undir leiting eftir olju á føroyskum øki eru um at verða førdar út í lívið, kemur hetta at krevja eina munandi størri fyrisiting og tørv á útgerð.

Arbeiðsbólkurin bað Vaktar- og Bjargingartænastuna og Heilsufrøðiligu Starvsstovuna um eina meting av kostnaðinum, sambært frammanfyri nevnda uppskot um fyrisiting av lógini.

Fyri Heilsufrøðiliga Starvsstovan verður í fyrstu atløgu neyðugt at fáa eina upphædd upp á umleið 1.2 mill. árliga, ella svarandi til umleið 3 fólk. Hetta er ein avgjørd fortreyt fyri at stovnurin skal ætla sær hetta arbeiðsøkið. Harafturat vísti stovnurin á, at tað skjótt kann gerast neyðugt við størri orku, tá ið oljuleiting kemur at fara fram.

Hjá Vaktar- og Bjargingartænastuni er neyðugt at betra um móttøkuna av fráboðanum, betra um eftirlitið við føroyska havøkinum, betra um útgerðina til tilbúgving og upptøku av oljudálkingum, betra um upplæringina av manningum og at fáa játtan til keyp av meiri útgerð. Sostatt verður í fyrstu atløgu talan um ein tørv upp á nakrar milliónir.

d. Hoyringssvar
Uppskotið hevur verið til hoyringar, og hevur Vinnumálastýrið fingið viðmerkingar frá Fiskivinnustýrinum, Føroya Reiðarafelag, Sjóvinnufyrisitingini, Føroya Kommunufelag og Kommunubúlkinum.

Her verður gjørd ein stutt lýsing og viðgerð av nøkrum av viðmerkingunum. Viðmerkingarnar frá teimum nevndu eru í vinnumálastýrisins journal 2710-1/94.

Fiskimálastýrið sigur í sínum viðmerkingum, at MARPOL-reglurnar eru galdandi fyri føroysk skip, og at Vaktar- og Bjargingartænastan fremur landsstýrisins skyldu um eftirlit og verndartiltøk.

Vísandi til partin um fyrisitingar- og eftirlitsbygnað, verður sagt, at tað ikki er landsstýrið, men landsstýrismaðurin við tí avvarandi málsøkinum, sum hevur ábyrgdina av fyrisiting, eftirliti, fráboðanarmóttøku, vernd og basing av dálking av føroyskum havøki, og tí má hesin parturin rættast til sambært stýrisskipanarlógini.

Fyrisitingin sambært kongligu fyriskipanini má leggjast til avvarandi landsstýrismann ella stýri hansara, og kann landsstýrismaðurin síðani gera avtalur við aðrar um at loysa hesar uppgávur. Í hesum mugu tær fíggjarligu avleiðingarnar havast í huga beinanvegin.

Fiskimálastýrið sigur seg ikki kunna góðtaka, at eftirlitið við at basa havdálking og móttaka fráboðanir við lóg verður løgd til Vaktar- og Bjargingartænastuna, sum er ein partur av fiskimálastýrinum. Fiskimálastýrið kann hava ábyrgdina og myndugleikan, um hetta verður ásett í lógini. Fíggjarliga byrðan má ikki leggjast til fiskimálastýrið uttan so, at vinnumálastýrið og avvarandi landsstýrismaður gera avtalu um neyðuga játtan.

Viðm.: Hetta skal fáa í lag við samstarvsavtalu millum vinnumálastýrið og fiskimálastýrið.

Spurningur verður settur við § 7, um hvørjar altjóða avtalur talan kann verða um.

Viðm.: Vísast skal til viðmerkingarnar í donsku lógini til § 7, sum vísir, at eingin broyting er her í mun til galdandi lóg.

Viðvíkjandi § 21 verður sagt, at havumhvørvislógin ikki má mótvirka lógini um vinnuligan fiskiskap, har øll útblaking er bannað.

Viðm.: Vísast skal til viðmerkingarnar í donsku lógini í § 21, sum svarar til § 23 í galdandi lóg, sum vísir, at her er samsvar við lógina um vinnuligan fiskiskap.

Føroya Reiðarafelag spyr í sínum viðmerkingum um fyrisiting og eftirlitsbygnað hví landsstýrið ikki skal hava ábyrgd av VVMviðgerðini (t.e. Vurderinger af og Virkninger på Miljøet).Viðm.: Vísast skal til, at hetta má vera ein misskiljing. Slík heimild liggur í oljulóggávuni.

Gjørt verður galdandi, at landsstýrið skal luttaka á altjóða regluskapandi samstarvinum og ikki Heilsufrøðiliga Starvsstovan, sum arbeiðsbólkurin hevur skotið upp. Hetta tí, at hetta kann vera óheppið fyri vinnuna, tá kærumyndugleiki og eftirlit verða mannað av sama persónum.

Spurt verður hví § 2 í lógini ikki umfatar útlendskar plattformar og flogfør.

Viðm.: Hetta er ikki so, og sæst hetta í viðmerkingunum til § 2.
Viðvíkjandi § 8 verður tikið til eftirtektar, at tað skal standa »*færøske* organisationer og statslige myndigheder«.

Í § 10 verður spurt hví danir skulu gera reglur um »oljejournalens førelse og indretning«.

Viðm.: Talan er um eina danska lóg, og har danskar mannagongdir eru ásettar.

Spurt verður hví § 56 ikki er strikað, og her skal viðmerkjast, at tað er tí at talan er um møgulig krøv í MARPOLregi.

Víst verður á, at tá ið loyvir verða broytt ella tikin aftur sambært § 57, skal vinnan hava endurgjald í slíkum førum.

Viðm.: Loyvir verða broytt ella tikin aftur tá »hensynet til havmiljøet gør det fornødent«. Í viðmerkingunum til § 57 er hetta útgreinað, og verður m.a. sagt: »det følger af almindelige forvaltningsregler, at tilbagekaldelse skal varsles og kan finde sted uden erstatning«.

Sjóvinnufyrisitingin vísti á, at tvær kunngerðir vantaðu í yvirlitinum. Tær eru tiknar við.

Kommunubólkurin »Føroya Býarfelag« boðaði í skrivi frá, at teir ynsktu ein fund við vinnumálastýrið, tí at sakkønnu fólk teirra mettu hetta vera neyðugt. Á fundinum komu hesar viðmerkingar:

Tilbúgvingaratlaninin, sum er ein avgjørd fortreyt fyri at trupulleikar viðvíkjandi dálking o.ø. kunnu loysast, tá teir henda, má taka støðu til og greiða trupulleikarnar.

Kommunubólkurin metir, at fortreytin fyri at uppgávurnar, sum skulu loysast sambært lógini, er at tilbúgvingaratlanin fyriliggur. T.v.s. at greitt má vera hvat kommununar skulu gera, hvussu fráboðan og samskipan skal fara fram og hvør stýrir.

Viðm.: Vinnumálastýrið hevur sent viðmerkingarnar viðvíkjandi tilbúgvingarætlanini til bólkin, sum arbeiðir við hesi uppgávu.

Viðmerkingar til tær einstøku greinirnar
Viðmerkingar eru gjørdar til tær lógargreinarnar, har broytingar eru gjørdar orsaka av serligum føroyskum viðurskiftum. Annars verður vist til donsku lógarviðmerkingarnar.

Ad. § 2. Í hesi grein er innsett eitt nýtt stk. 4, har ásett er, at heimildirnar eftir stk. 3 um stuttleikafør eru lagdar til landsstýrið innanfyri føroyskt fiskimark. Líknandi broytingar eru gjørdar í fleiri øðrum greinum.

Ad. § 8. Í stk. 3 verður ásett, at har landsstýrismaðurin ásetir reglur, skal landsstýrið reika fyri neyðugum hoyringum av felagsskapum og myndugleikum.

Ad. § 11. Ásett verður, at á føroyskum sjóøki er ikki loyvt at útleiða olju. Sjóøkið gongur út á 3 fjórðingar úr landi.

Ad. § 13. Her verður danskt sjóøki broytt til føroyskt sjóøki.

Ad. § 20. Her verður gjørd sama broyting sum í §13.

Ad. § 21. Í hesi grein verður sett nýtt stk., 3 um, at landsstýrið innan fyri føroyska fiskimarkið hevur heimildina eftir stk. 2 at áseta reglur um útblaking av slógvi og feskum fiski.

Ad. § 22. Í nýggjum stk. 4 verður ásett, at landsstýrið fær heimild at áseta reglur um útblaking av matvørum frá boripallum og skipum við boripallar á føroyskum fiskiveiðiøki.

Ad. § 24. Reglan í stk. 1 um at landsstýrið kann áseta reglur um móttøkuskipanir í føroyskum havnum finst eisini í galdandi skipan, samb. kunngerð nr. 20 frá 08.04.1987.

Ad. § 26. Skotið verður upp at avtaka §26, stk. 5, sum óneyðuga at galda fyri føroyskt sjóøki og í staðin verður sett nýtt stk. 5, har ásett verður, at loyvi krevst frá einum av landsstýrinum heimilaðum stovni til at dumpa havbotnstilfar á føroyskum havøki.

Ad. § 28. Her verður eins og í broytingini av §26 ásett, at landsstýrið hevur eftirlitið og heimildina at áseta reglur viðvíkjandi upptøku og søkking av havbotnstilfari innan føroyska fiskimarkið.

Ad. § 30. Sett er nýtt stk. 3 har ásett verður, at heimildin at áseta reglur í samband við útrøming og hurturkast í samband við útvinning av ræevnum herundir olju úr føroyska havbotninum, er hjá landsstýrinum.

Ad. § 31. Eftir §31 kemur landsstýrið at áseta reglurnar um brenning av ruski á boripallum.

Ad. § 32. Landsstýrið kann eftir stk. 2 áseta reglur um krøv til brennievni til nýtslu á boripallum.

Ad. § 33. Reglurnar í stk. 2 og 3 í lógini um skjóttgangandi ferjur verða eisini galdandi fyri sigling til føroyskar havnir og eftir stk., 3 kann landsstýrið áseta neyðugar reglur.

Ad. § 34. Í hesa grein verður innsett nýtt stk. 2 um, at innan fyri føroyska fiskimarkið hevur landsstýrið ábyrgdina av basing av olju- og aðrari dálking. Hesa ábyrgd hevur landsstýrið eisini eftir galdandi fyriskipan.

Ad. § 35. Í greinina er innsett nýtt stk. 7 um, at kommunurnar hava ábyrgdina av upprudding av tí dálking, sum rekur inn á land.

Ad. § 38. Ásett verður í nýggjum stk. 5, at fráboðanir um dálking innan fyri føroyska fiskimarkið skulu fráboðast til Føroya Landsstýri, ella til tann sum landsstýrið heimilar at taka fnóti fráboðanum. Ætlanin er, at Vaktar- og Bjargingartænastan skal taka fnóti fráboðanunum.

Ad. § 41. Innsett er nýtt stk.. 2 um, at heimildin at áseta reglur viðvíkjandi føroyskum havnum er hjá landsstýrinum.

Ad. § 42. Á føroyskum sjó- og fiskiveiðiøki hevur landsstýrið, ella tann, sum landsstýrið heimilar til tess, eftirlitið við ólógligari dálking frá skipum og boripallum.

Ad. § 43. Eftir stk. 6 fær landsstýrið, ella tann, sum landsstýrið heimilar til tess, heimild at fremja neyðug tiltøk at fyribyrgja dálking.

Ad. § 43a. Heimildin at seta skipum, sum ikki halda lógarreglurnar, forboð at koma í føroyskar havnir, verður løgd til landsstýrið, samb. stk.. 6.

Ad. § 44. Heimildin at krevja trygd frá eigarum av skipum og boripallum fyri dálking, og at halda aftur skip og boripallar til trygd er sett fyri dálking, verður løgd til landsstýrið.

Ad. § 45. Eftirlitið við at lóg og kunngerðir við heimild í lógini verða hildnar á føroyskum sjó- og veiðiøki verður lagt til landsstýrið, ella til ein stovn, sum landsstýrið heimilar til tess. Hesa eftirlitsskyldu hevur landsstýrið eisini eftir galdandi skipan.

Ad. § 48. Ásett verður í stk.. 3, at umsitingin í Føroyum av havumhvørvislógini við tilhoyrandi kunngerðum verður løgd undir landsstýrið ella stovnar, sum landsstýrið heimilar til tess.

Ad. § 49. Í hesu grein verður ásett, hvør skal hava boð um avgerðir, sum landsstýrið ella heimilaðir stovnar taka avgerð í.

Ad. § 51 og § 52. Ásett verður í hesum greinum reglur um kærumyndugleika og hvør kann kæra avgerðir, ið landsstýrið ella tess stovnar hava avgreitt.
»Tilbageholdelsesnævnet« er nevnd, sum er sett við heimild í lóg um skipatrygd.

Ad. § 53a. Landsstýrið umsitur reglurnar í grein 33 um skjóttgangandi ferjur og kann eftir hesi grein eisini avgera, um kærur skula virka tálmandi.

Ad. § 54. Til vísindaligar kanningar á føroyskum sjó- ella fiskiveiðiøki krevst loyvi frá landsstýrinum ella tí stovni, sum landsstýrið hevur heimilað til tess.

Ad. § 55. Tá føroyskir myndugleikar koma at umsita havumhvørvislógina á føroyskum sjó- og fiskiveiðiøki, fær landsstýrið heimild at áseta reglur um gjøld fyri útreiðslur av umsitingini.

Ad. § 62. Sett er inn í lógargreinina, at landið eisini kann koma undir revsiábyrgd. Ávísingin til §60 verður strokin, tí eingin líknandi grein finst í føroysku kommunulógini.

Ad. § 64. Eftir nýggju lógini verður søkking í havið (dumping) ikki loyvd. Í stk.. 3 verður skotið upp at hava eina skiftisreglu, sum loyvir undantaksloyvi at søkkja træskip til ár 2004.

Skjøl:
1. Udkast til anordning om ikrafttræden for Færøerne af lov om beskyttelse af havmiljøet.
2. Álit frá arbeiðsbólkinum.
3. Viðmerkingar til donsku havumhvørvislógina. (Sí folketingstidende 1992 - 93 A sp. 7277)

Skjal 1

U D K A S T

Anordning om ikrafttræden for Færøerne af lov om beskyttelse af havmiljøet

Vi MARGRETHE DEN ANDEN, af Guds Nåde Danmarks Dronning, gør vitterligt:

I medfør af § 68, stk.1, i lov nr. 476 af 30. juni 1993 om beskyttelse af havmiljøet som senest ændret ved lov nr. 435 af 10. juni 1997 bestemmes, at loven skal gælde for Færøerne i følgende affattelse:

Kapitel 1

Formål m.v.

§ 1. Loven skal medvirke til at værne natur og miljø, så samfundsudviklingen kan ske på et bæredygtigt grundlag i respekt for menneskets livsvilkår og for bevarelsen af dyre- og plantelivet.

Stk. 2. Med denne lov tilsigtes at forebygge og begrænse forurening og anden påvirkning af natur ogmiljø, herunder særligt havmiljøet, fra aktiviteter, der kan

1) bringe menneskets sundhed i fare,

2) skade natur- og kulturværdier på og i havet, herunder havbunden

3) være til gene for den retmæssige udnyttelse af havet eller

4) forringe rekreative værdier eller aktiviteter.

Stk. 3. Loven skal endvidere sikre opretholdelsen af et beredskab til indsats mod forurening på havet, på kyster og i havne.

§ 2. Loven omfatter Færøernes sø- og fiskeriterritorium samt kontinentalsokkelområde. Følgende skibe, luftfartøjer og platforme er omfattet:

1) danske og færøske skibe

2) danske og færøske luftfartøjer,

3) danske og færøske platforme, og

4) udenlandske skibe i det omfang det er foreneligt med international ret.

Stk. 2. Loven omfatter ikke orlogsskibe og andre skibe, der ejes eller benyttes af en stat, så længe skibet udelukkende benyttes i ikke-kommerciel statstjeneste.

Stk. 3. Skibe, der udelukkende benyttes til fritidsformål (lystfartøjer) er ikke omfattet af bestemmelserne i § 20, stk. 1, og kapitel 12. Ved anvendelsen af beføjelserne i kapitlerne 2, 6, 7 og 10 kan miljø- og energiministeren dog fastsætte særlige regler for lystfartøjer.

Stk. 4. Miljø- og energiministerens beføjelse efter stk. 3, udøves for sø- og fiskeriterritoriet ved Færøerne af Færøernes Landsstyre.

§ 3. Ved lovens administration, herunder ved anvendelsen af lovens bemyndigelser, skal der lægges vægt på, hvad der er opnåeligt ved anvendelse af den mindst forurenende teknologi, herunder mindre forurenende råvarer, processer og anlæg og de bedst mulige forureningsbegrænsende foranstaltninger. Ved denne vurdering skal der lægges særlig vægt på en forebyggende indsats gennem anvendelse af renere teknologi.

Stk. 2. Ved bedømmelsen af omfanget og arten af foranstaltninger til forebyggelse og imødegåelse af forurening skal der lægges vægt på

1) de ydre omgivelsers beskaffenhed og forureningens sandsynlige indvirkning på disse og

2) hele det kredsløb, som stoffer og materialer gennemløber, med henblik på at begrænse spild af ressourcer mest muligt.

§ 4. Ved udtømning forstås i denne lov enhver udledning, udflydning eller bortskaffelse i havet af stoffer eller materialer, der stammer fra den normale drift af skibe eller bevægelige eller fast anbragte platforme.

Stk. 2. Ved dumpning forstås i denne lov enhver bortskaffelse i havet - som ikke er udtømning - af stoffer eller materialer fra eller sammen med skibe, fly eller bevægelige eller fast anbragte platforme og enhver bortskaffelse i havet af skibe, fly eller bevægelige eller fastanbragte platforme, herunder enhver udledning,

udflydning eller bortskaffelse af stoffer eller materialer, der er bragt om bord eller transporteres med henblik på bortskaffelse eller stammer fra behandling af stoffer eller materialer, der er bragt om bord eller transporteres med henblik på bortskaffelse.
Stk. 3. Som udtømning eller dumpning anses ikke
1) anbringelse i havet af stoffer eller materialer, hvis anbringelse sker med andet formål end bortskaffelse,
2) udledning i havet af stoffer eller materialer, der er en direkte følge af undersøgelse eller udnyttelse af undersøiske mineralforekomster, jf. kapitel 10, og
2) efterladelse på eller i havbunden af platforme og andre anlæg til brug i forbindelse med efterforskning og indvinding af råstoffer i undergrunden, ørledninger og andre anlæg til transport af sådanne råstoffer samt vindkraftanlæg på søterritoriet, disses fundamenter og tilhørende ledningsanlæg.
Stk. 4. Ved afbrænding forstås i denne lov enhver bortskaffelse på havet ved hjælp af termisk destruktion.

§ 5. Ved Østersøområdet forstås i denne lov Østersøen, Den botniske Bugt, Den finske Bugt, Sundet, Bælterne samt Kattegat indtil breddeparallellen 57°44,8'N gennem Skagen.
Stk. 2. Ved Nordsøområdet forstås den egentlige Nordsø samt andre havområder inden for følgende grænser:
a) Nordsøen syd for den 62. nordlige breddegrad og øst for meridianen 4°V.
b) Skagerrak afgrænset i syd af breddeparallellen 57°44.8'N gennem Skagen.
c) Den engelske Kanal og adgangsvejene hertil øst for meridianen 5°V, og nord for breddeparallellen 48°30'N.

§ 6. Ved nærmeste kyst forstås i denne lov den basislinie, hvorfra det ydre territorialfarvand er fastlagt i overensstemmelse med international ret.
Stk. 2. Miljø- og energiministeren kan til opfyldelse af internationale aftaler fastsætte regler om, hvad der i nærmere angivne havområder forstås ved nærmeste kyst.

§ 7. Miljø- og energiministeren kan til opfyldelse af internationale aftaler bestemme, at et havområde er et særligt havområde.

§ 8. Inden miljø- og energiministeren fastsætter regler i medfør af loven, forhandler ministeren med de nærmeste interesserede landsomfattende erhvervs- og miljøorganisationer, de kommunale organisationer og andre berørte statslige myndigheder, herunder erhvervsministeren og trafikministeren.
Stk. 2. Når Færøernes Landsstyre udsteder regler i medfør af loven, pålægger landsstyret sig de i stk. 1, foreskrevne forhandlinger med de foreskrevne organisationer og statslige myndigheder.

Kapitel 2
Olie

§ 9. Ved olie forstås i denne lov enhver form for mineralolie og blandinger heraf, herunder råolie, naturgaskondensat, olieslam og olieaffald, samt brændselsolie og alle andre raffinerede produkter bortset fra petrokemikalier, der er klassificerede i henhold til § 14.
Stk. 2. Ved olietankskib forstås et skib, der er indrettet til at transportere, eller som transporterer olie i bulk.

§ 10. Ethvert olietankskib med en bruttotonnage på 150 BRT og derover, andre skibe med en bruttotonnage på 400 BRT og derover, som anvender olie som brændstof, og platforme skal føre en oliejournal.
Stk. 2. Miljø- og energiministeren fastsætter nærmere regler for oliejournalens førelse og indretning.
Stk. 3. Oliejournalen skal forevises kompetent myndighed med forlangende.

§ 11. På færøsk søterritorium må udtømning af olie ikke finde sted.
Stk. 2. Uden for færøsk søterritorium må udtømning af olie kun finde sted i overensstemmelse med regler fastsat i medfør af stk. 3.
Stk. 3. Miljø- og energiministeren kan til opfyldelse af internationale aftaler fastsætte nærmere regler om udtømning af olie og oliebholdigt ballastvand uden for færøsk søterritorium fra olietankskibe, andre skibe

og platforme. Ministeren kan herunder bestemme, hvor udtømning må finde sted, hvordan udtømningen skal foregå, herunder at den skal ske under anvendelse af godkendte systemer, og hvilke mængder der må udtømmes, herunder udtømningshastighed.

Kapitel 3

Flydende stoffer, som transporteres i bulk

§ 12. Ved flydende stoffer forstås i denne lov stoffer, hvis damptryk ikke overstiger 2,8 kp/cm2 ved en temperatur på 37,8° C.

§ 13. På færøsk søterritorium må udtømning af flydende stoffer, som transporteres i bulk, bortset fra vand ikke finde sted.
Stk. 2. Uden for færøsk søterritorium må udtømning af de af stk. 1 omfattede stoffer kun finde sted i overensstemmelse med de regler, der er fastsat i medfør af § 14.

§ 14. Miljø- og energiministeren kan til opfyldelse af internationale aftaler fastsætte regler om klassifikation af flydende stoffer, som transporteres i bulk, og regler om, at stoffer, der er klassificerede som skadelige, ikke må udtømmes eller kun kan udtømmes på særlige betingelser. Miljø- og energiministeren udfærdiger en fortegnelse over klassificerede stoffer.

§ 15. Flydende stoffer, bortset fra olie, der ikke er optaget på den i medfør af § 14 udfærdigede fortegnelse, skal, forinden de transporteres i bulk til eller fra færøsk havn, midlertidigt klassificeres af miljø- og energiministeren.

§ 16. Skibe, der er indrettet til, eller som transporterer flydende stoffer i bulk (kemikalietankskibe), skal føre en journal for flydende stoffer, der i henhold til §§ 14 og 15 er klassificerede som skadelige.
Stk. 2. Miljø- og energiministeren fastsætter nærmere regler for journalens førelse og indretning.
Stk. 3. Journalen skal forevises kompetent myndighed med forlangende.

§ 17. Miljø- og energiministeren kan fastsætte regler om losning og udtømning af tankskyllevand og om kontrol med overholdelse af bestemmelserne, herunder om udpegning og bemyndigelse af personer, der skal udføre kontrollen.
Stk. 2. Færøernes Landsstyre fastsætter regler om udpegning og bemyndigelse af de personer, der skal udføre kontrollen på Færøerne.

Kapitel 4

Stoffer og materialer i emballeret form, containere m.v.

§ 18. Miljø- og energiministeren kan til opfyldelse af internationale aftaler fastsætte nærmere regler eller træffe bestemmelse om transport af stoffer og materialer i emballeret form, containere m.v., herunder regler om varsling og pligt til at afgive oplysninger om lastens indhold.

Kapitel 5

Faste stoffer, som transporteres i bulk

§ 19. Miljø- og energiministeren kan til opfyldelse af internationale aftaler fastsætte regler om klassificering af faste stoffer, som transporteres i bulk, og regler om, at stoffer, der er skadelige, ikke må udtømmes eller kun udtømmes på særlige betingelser. Miljø- og energiministeren kan udfærdige en fortegnelse over klassificerede stoffer.

Kapitel 6

Kloakspildevand

§ 20. På færøsk søterritorium må udtømning af kloakspildevand (afløbsstoffer eller andet affald fra toiletter, hospitalsrum og rum, hvori der findes levende dyr) kun finde sted, såfremt

1) udtømningen foretages under anvendelse af et godkendt anlæg til behandling af kloakspildevand og spildevandet ved udløbet fra anlægget ikke frembringer synlige spor i havet,
2) spildevandet er findelt og desinficeret i et godkendt anlæg og udtømningen sker i en afstand af mindst 4 sømil fra nærmeste kyst eller
3) udtømningen foretages i en afstand af mindst 12 sømil fra nærmeste kyst. Foretages udtømning fra en tank til opsamling og opbevaring af kloakspildevand, skal skibets eller platformens fart endvidere være mindst 4 knob, og udtømningen skal ske med moderat udløbshastighed.
Stk. 2. Landsstyremanden kan fastsætte særlige regler om udtømning af kloakspildevand i de i stk. 1 nævnte havområder, herunder forbud mod udtømning i havne, bugter, fjorde og lign. områder eller forbud mod udtømning fra bestemte skibe.
Stk. 3. Miljø- og energiministeren kan til opfyldelse af internationale aftaler fastsætte regler om udtømning af kloakspildevand uden for færøsk søterritorium.

Kapitel 7

Affald

§ 20 a. Ethvert skib med en bruttotonnage på 400 eller derover og ethvert skib, der er godkendt til at befordre 15 personer eller flere, skal føre en affaldsjournal.
Stk. 2. Miljø- og energiministeren fastsætter nærmere regler for affaldsjournalens førelse og indretning.
Stk. 3. Affaldsjournalen skal forevises kompetent myndighed med forlangende.

§ 21. På færøsk søterritorium må udtømning af affald bortset fra frisk fisk og dele deraf ikke finde sted.
Stk. 2. Miljø- og energiministeren kan inden for rammerne af Fiskeriministeriets lovgivning og EF-bestemmelser på fiskeriområdet fastsætte regler om udtømning af frisk fisk og dele heraf.
Stk. 3. Miljø- og energiministerens beføjelse efter stk. 2, udøves for for sø- og fiskeriterritoriet ved Færøerne af Færøernes Landsstyre.

§ 22. I Nordsøområdet må levnedsmiddelaffald kun udtømmes, såfremt udtømningen sker mindst 12 sømil fra nærmeste kyst.
Stk. 2. Miljø- og energiministeren kan, herunder til opfyldelse af internationale aftaler, fastsætte regler om udtømning af levnedsmiddelaffald uden for dansk færøsk sø- og fiskeriterritorium, herunder Nordsøområdet.
Stk. 3. Miljø- og energiministeren kan fastsætte særlige regler om bortskaffelse af levnedsmiddelaffald fra platforme og fra skibe, der er beliggende inden for en afstand af 500 m fra en platform.
Stk. 4. Miljø- og energiministerens beføjelse efter stk. 3, udøves for færøsk sø- og fiskeriterritorium samt kontinentalsokkelområdet ved Færøerne af Færøernes Landsstyre.

§ 23. I Nordsøområdet må udtømning af affald bortset fra levnedsmiddelaffald ikke finde sted.
Stk. 2. Miljø- og energiministeren kan til opfyldelse af internationale aftaler fastsætte regler om udtømning af affald, der ikke er levnedsmiddelaffald, uden for færøsk sø- og fiskeriterritorium, og i Nordsøområdet.

Kapitel 8

Modtageanlæg

§ 24. Miljø- og energiministeren kan efter forhandling med trafikministeren fastsætte regler og træffe bestemmelse om oprettelse og indretning af anlæg til modtagelse af rester af olie og skadelige flydende stoffer og kloakspildevand samt affald i havne. Det kan i den forbindelse pålægges bunkringsvirksomheder, virksomheder, som foretager afskibning eller modtagelse af olie eller af skadelige flydende stoffer og skibsreparationsvirksomheder at etablere modtageanlæg for olie- eller kemikalieblandet ballast- og tankskylle vand.
Stk. 2. Miljø- og energiministerens beføjelse efter stk. 1, udøves for modtageanlæg i færøske havne af Færøernes Landsstyre.

Kapitel 9

Dumpning

§ 25. Dumpning af stoffer eller materialer må ikke finde sted bortset fra dumpning af optaget havbundsmateriale.

Stk. 2. Det er ikke tilladt med henblik på dumpning bortset fra dumpning af havbundsmaterialer at overlade stoffer eller materialer til transport eller at transportere eller indlaste dem.

§ 26. Tilladelse til meddelelse af dumpning af optaget havbundsmateriale meddeles for sø- og fiskeriterritoriet ved Færøerne af en af Færøernes Landsstyre bemyndiget forvaltningsinstitution.

Stk. 2. I vurderingen af en ansøgning om tilladelse til dumpning af optaget havbundsmateriale skal indgå de forhold og hensyn, der er anført i bilag 1.

Stk. 3. Der må kun meddeles tilladelse til dumpning af havbundsmateriale, såfremt havbundsmaterialet vurderes at indeholde uvæsentlige mængder og koncentrationer af de i bilag 2 nævnte stoffer og materialer, og såfremt disse ikke er tilført havbundsmaterialet med henblik på bortskaffelse.

Stk. 4. Til brug for den i stk. 2 og 3 nævnte vurdering kan den af landsstyret bemyndigede forvaltningsinstitution stille krav om, at ansøgeren for egen regning lader foretage analyser af havbundsmaterialet.

Stk. 5. Udgår.

Stk. 6. Dumpning af optaget havbundsmateriale skal fortrinsvis finde sted inden for færøsk søterritorium

§ 27. Tilladelse til dumpning af havbundsmateriale skal være tidsbegrænset og angive, hvilke stoffer eller materialer der omfattes af tilladelsen, den samlede mængde, positionen for dumpningen og tilladelsens udløbsdato. Endvidere kan der i tilladelsen stilles vilkår om bl.a. fremgangsmåden, herunder om optagning og udlægning, tilsyns- og sikkerhedsforanstaltninger og indberetning. Ved anden bortskaffelse af havbundsmateriale end dumpning kan der fastsættes vilkår om oplagringsmetode.

§ 28. Miljø- og energiministeren kan fastsætte nærmere regler om tilladelsesordningen for dumpning af havbundsmateriale, herunder om ansøgningens indhold, om prøveudtagning og analyser af havbundsmateriale og om amtsrådets vurdering og behandling af sager efter § 26.

Stk. 2. Udgår

Stk. 3. Miljø- og energiministerens beføjelse efter stk. 1, udøves for for sø- og fiskeriterritoriet ved Færøerne af Færøernes Landsstyre.

§ 29. Miljø- og energiministeren kan, herunder til opfyldelse af internationale aftaler, foretage ændringer i bilag 1-2.

Kapitel 10

Anden forurening

§ 30. Miljø- og energiministeren kan, herunder til opfyldelse af internationale aftaler, fastsætte regler om udledning i havet og anden bortskaffelse af stoffer og materialer, der stammer fra undersøgelse eller udnyttelse af undersøiske mineralforekomster, herunder kulbrinter.

Stk. 2. I regler udstedt i medfør af stk. 1 kan det bestemmes, at udledning eller anden bortskaffelse af bestemte stoffer ikke må finde sted, såfremt dette må antages at indebære en væsentlig risiko for forurening af omgivelserne.

Stk. 3. Miljø- og energiministerens beføjelse efter stk. 1 og 2, udøves for kontinentalsokkelområdet ved Færøerne af Færøernes Landsstyre.

§ 31. Afbrænding af stoffer eller materialer på havet må ikke finde sted.

Stk. 2. Det er ikke tilladt med henblik på afbrænding på havet at overlade stoffer eller materialer til transport eller at transportere og indlaste dem.

Stk. 3. Det i stk. 1 nævnte forbud omfatter ikke

1) bortskaffelse ved afbrænding af normaldriftsaffald fra skibe og platforme og

2) bortskaffelse ved afbrænding af stoffer og materialer, der stammer fra undersøgelse eller udnyttelse af undersøiske mineralforekomster, jf. § 30.
Stk. 4. Miljø- og energiministeren kan, herunder til opfyldelse af internationale aftaler, fastsætte regler om bortskaffelse af normaldriftsaffald fra skibe og platforme ved afbrænding.
Stk. 5. Miljø- og energiministerens beføjelse efter stk. 4, for så vidt angår bortskaffelse af normaldriftsaffald fra platforme ved afbrænding udøves for kontinentalsokkelområdet ved Færøerne af Færøernes Landsstyre.

§ 32. Miljø- og energiministeren kan, herunder til opfyldelse af internationale aftaler, fastsætte regler om særlige foranstaltninger, herunder krav til brændstof, om bord i skibe eller på platforme med henblik på begrænsning af luftforurening.
Stk. 2. Miljø- og energiministerens beføjelse efter stk. 1, for så vidt angår krav til brændstof på platforme udøves for kontinentalsokkelområdet ved Færøerne af Færøernes Landsstyre.

§ 33. Miljø- og energiministeren kan, herunder til opfyldelse af internationale aftaler, fastsætte regler, jf. lovens formål, til forebyggelse og begrænsning af forurening fra aktiviteter på havet, som ikke er omfattet af reglerne i kapitel 2-10.
Stk. 2. Miljø- og energiministeren kan fastsætte regler om, at oprettelse af en hurtigfærgerute, der anløber mindst én færøsk havn, indsættelse af en hurtigfærge på en eksisterende rute, væsentlig ændring af sejladsfrekvensen på en eksisterende hurtigfærgerute samt væsentlige afvigelser af sejlruter for hurtigfærger ikke må ske, før der er meddelt miljøgodkendelse af miljø- og energiministeren. Ministeren kan endvidere fastsætte regler om, at eksisterende hurtigfærgeruter, som har mindst én færøsk anløbshavn skal ansøge om godkendelse og om fristen for indsendelse af ansøgningen.
Stk. 3. Ministeren kan fastsætte nærmere regler om godkendelsesordningen. Herunder kan ministeren fastsætte krav om, at der skal foretages en miljøkonsekvensvurdering af hurtigfærgeruten, hvor der er begrundet formodning om, at den påtænkte sejlads kan have væsentlig indvirkning på miljø, natur, fritidsinteresser eller kulturminder. Ministeren kan endvidere fastsætte regler om, i hvilket omfang rederiet skal bidrage med oplysninger til miljøkonsekvensvurderingen, samt i hvilket omfang offentligheden og de berørte myndigheder og organisationer skal inddrages.
Stk. 4. Miljø- og energiministerens beføjelse efter stk. 1, 2 og 3, udøves for sø- og fiskeriterritoriet ved Færøerne af Færøernes Landsstyre.

Ad. §8. Í stk. 3 verður ásett, at har landsstýrið ásetir reglur, skal landsstýrið reika fyri neyðugum hoyringum av felagsskapum og myndugleikum.

Ad. §11. Ásett verður, at á føroyskum sjóøki er ikki loyvt at útleiða olju. Sjóøkið gongur út á 3 fjórðingar úr landi.

Ad. §13. Her verður danskt sjóøki broytt til føroyskt sjóøki.

Ad. §20. Her verður gjørd sama broyting sum í §13.

Ad. §21. Í hesi grein verður sett nýtt stk. 3 um, at landsstýrið innan fyri føroyska fiskimarkið hevur heimildina eftir stk. 2 at áseta reglur um útblaking av slógvi og feskum fiski.

Ad. §22. Í nýggjum stk. 4 verður ásett, at landsstýrið fær heimild at áseta reglur um útblaking av matvørum frá boripallum og skipum við boripallar á føroyskum fiskiveiðiøki.

Ad. §24. Reglan í stk. 1 um at landsstýrið kann áseta reglur um móttøkuskipanir í føroyskum havnum finst eisini í gatdandi skipan, samb. kunngerð nr. 20 frá 08.04.1987.

Ad. §26. Skotið verður upp at avtaka §26, stk. 5, sum óneyðuga at galda fyri føroyskt sjóøki og í staðin verður sett nýtt stk. 5, har ásett verður, at loyvi krevst frá einum av landsstýrinum heimilaðum stovni til at dumpa havbotnstilfar á føroyskum havøki.

Ad. §28. Her verður eins og í broytingini av §26 ásett, at landsstýrið hevur eftirlitið og heimildina at áseta reglur viðvíkjandi upptøku og søkking av havbotnstilfari innan føroyska fiskimarkið.

Ad. §30. Sett er nýtt stk. 3 har ásett verður, at heimildin at áseta reglur í samband við úttøming og burturkast í samband við útvinning av rávevnum herundir olju úr føroyska havbotninum, er hjá landsstýrinum.

Ad. §31. Eftir §31 kemur landsstýrið at áseta reglurnar um bretning av ruski á boripallum.

Ad. §32. Landsstýrið kann eftir stk. 2 áseta reglur um krøv til brennievni til nýtslu á boripallum.

Ad. §33. Reglurnar í stk. 2 og 3 í lógini um skjóttgangandi ferjur verða eisini galdandi fyri sigling til føroyskar havnir og eftir stk. 3 kann landsstýrið áseta neyðugar reglur.

Ad. §34. Í hesa grein verður innsett nýtt stk. 2 um, at innan fyri føroyska fiskimarkið hevur landsstýrið ábyrgdina av basing av olju- og aðrari dálking. Hesa ábyrgd hevur landsstýrið eisini eftir galdandi fyriskipan.

Ad. §35. Í greinina er innsett nýtt stk. 7 um, at kommunurnar hava ábyrgdina av upprudding av tí dálking, sum rekur inn á land.

Ad. §38. Ásett verður í nýggjum stk. 5, at fráboðanir um dálking innan fyri føroyska fiskimarkið skulu fráboðast til Føroya Landsstýri, ella til tann sum landsstýrið heimilar at taka ímóti fráboðanum. Ætlanin er, at Vakt- og Bjargingartænastan skal taka ímóti fráboðanunum.

Ad. §41. Innsett er nýtt stk. 2 um, at heimildin at áseta reglur viðvíkjandi føroyskum havnum er hjá landsstýrinum.

Ad. §42. Á føroyskum sjó- og fiskiveiðiøki hevur landsstýrið, ella tann sum landsstýrið heimilar til tess, eftirlitið við ólógligari dálking frá skipum og borðpallum.

Ad. §43. Eftir stk. 6 fær landsstýrið, ella tann, sum landsstýrið heimilar til tess, heimild at fremja neyðug tiltøk at fyribyrgja dálking.

Ad. §43a. Heimildin at seta skipum, sum ikki halda lógarreglurnar, forboð at koma í føroyskar havnir, verður løgd til landsstýrið, saunb. stk. 6.

Ad. §44. Heimildin at krevja trygd frá eigarum av skipum og borðpallum fyri dálking og at halda aftur skip og borðpallar til trygd er sett fyri dálking verður løgd til landsstýrið.

Ad. §45. Eftirlitið við at lóg og kunngerðir við heimild í lógini verða hildnar á føroyskum sjó- og veiðiøki verður lagt til landsstýrið, ella til ein stovn, sum landsstýrið heimilar til tess. Hesa eftirlitsskyldu hevur landsstýrið eisini eftir galdandi skipan.

Ad. §48. Ásett verður í stk. 3, at umsitingin í Føroyum av havumhvørvislógini við tilhoyrandi kunngerðum verður løgd undir landsstýrið ella stovnar, sum landsstýrið heimilar til tess.

Ad. §49. Í hesu grein verður ásett, hvør skal hava boð um avgerðir, sum landsstýrið ella heimilaðir stovnar taka avgerð í.

Ad. §51 og §52. Ásett verður í hesum greinum reglur um kærumyndugleika og hvør kann kæra avgerðir, ið landsstýrið ella tess stovnar hava avgreitt.

»Tilbageholdelsesnævnet« er nevnd, sum er sett við heimild í lóg um skipatrygd.

Ad. §53a. Landsstýrið umsitur reglurnar í grein 33 um skjóttgangandi ferjur og kann eftir hesi grein eisini avgera, um kærur skula virka tálmandi.

Ad. §54. Til vísindaligar kanningar á føroyskum sjó- ella fiskiveiðiøki krevst loyvi frá landsstýrinum ella tí stovni, sum landsstýrið hevur heimilað til tess.

Ad. §55. Tá føroyskir myndugleikar koma at umsita havumhvørvislógina á føroyskum sjó- og fiskiveiðiøki, fær landsstýrið heimild at áseta reglur um gjøld fyri útreiðslur av umsitingini.

Ad. §62. Sett er inn í lógargreinina, at landið eisini kann koma undir revsiábyrgd. Ávísingin til §60 verður strikin, tí eingin líknandi grein finst í føroysku kommunulógini.

Ad. §64. Eftir nýggju lógini verður søkking í havið (dumping) ikki loyvd. Í stk. 3 verður skotið upp at hava eina skiftisreglu, sum loyvir undantaksloyvi at søkkja træskip til ár 2004.

Tilrættað uppskot er hjálagt. (Fylgiskjal 1).

Samandráttur

Arbeiðsbólkurin hevur gjørt viðmerkingar til uppskot til kgl. fyriskipan fyri havumhvørvið og eru hesar innarbeiddar í uppskotið til kgl. fyriskipan um havumhvørvið í samráði við danska umhvørvisstýrið. Víst er eisini á tær kunngerðir, sum eiga at setast í gildi í Føroyum, óbroyttar ella við ávísum broytingum.

Í mun til galdandi kgl. fyriskipan um havumhvørvið frá 1985 er uppskotið ein endurskoðan samsvarandi donsku havumhvørvislógini frá 1993 við seinni broytingum. Samhvørt uppskotinum eru allar heimildir inn-

ansyn fyri føroyska fiskimarkið lagdar til Føroya Landsstýri at fyrisita. Nýtt í hesum sambandi er, at fyrisitingin av útleitingarloyvum frá borivirkseni o.t. er lagd til Føroya Landsstýrið. Sama er við veitan av loyvum til dumping, tó er dumping avmarkað til træskip og fram til ár 2004.

Í uppskotinum um fyrisitingar- og eftirlitsbygnað fyri kgl. fyriskipanina um havumhvørvið verður víst á fylgjandi bygnað:

- Landsstýrið ger kunngerðir og er kærumyndugleiki fyri avgerðir, ið lagdar eru stovnum at umsita.
- Heilsufrøðiliga Starvsstovan tekur sær av dagligu umsitingini av havumhvørvislógini og kunngerðunum, herundir veitan av umhvørvisgóðkenningum, uppfylging av fráboðanum um brot á lógina og luttøka í altjóða regluskapandi arbeiði.
- Vaktar- og Bjargingartænastan hevur eftirlit við havdálking, móttekur fráboðanir um havdálking og tekur sær av at basa havdálking.
- Kommununar umsita móttøkuskipanir í havnum og fyriskipa tilbúgving og upptøku av dálking í Gjørum.

Arbeiðshólkurin hevur í álitinum fylgjandi tilmæli:

- at eftirlitið við kommunalu móttøkuskipanini í havnum verður flutt frá Vaktar- og Bjargingartænastuni til Heilsufrøðiligu Starvsstovuna.
- at møguleikarnir fyri at samskipa kommunalu tilbúgvingina og uppruddingina t.s.v. dálking verða kannaðir í sambandi við ta landstilbúgvingarætlan sum er í gerð.
- at Vaktar- og Bjargingartænastan luttekur í góðkenningarviðgerðini av tilbúgvingarskipanum hjá oljufeløgum og kommunum.
- at avtala verður gjørd við Skipasýnið, sum hevur eftirlitið við at skip líka gaddandi reglur um fyribyrging av havdálking, um, at fráboðanir um óreglulig viðurskifti verða latnar Heilsufrøðiligu Starvsstovuni.
  at gjørdar verða samstarvsavtalur millum føroyskar stovnar og samsvarandi danskar stovnar, har tað tøkiligt verður lýst, hvussu arbeiðast kann saman og hvussu samstarvið skal mennast.

Av øðrum ávísingum og tilmælum kann nevnast:

- at tað mest umhvørvisliga viðkvæma økið runt Føroyar er innanfyri 12 sjómíl og kann arbeiðsbólkurin mæla til, at sjómarkið verður víðka frá 3 til 12 sjómíl.
- at ein ógreiða um hvat gildi fyriskipanin hevur fyri útlendsk skip uttanfyri 3 sjómíl, so leingi húskaparligt mark ikki er lýst, ger, at tørvurin fyri at fáa lýst eina "Marine Pollution Zone" kring Føroyar, eigur at verða kannaður.

Hjálagt

Fylgiskjal 1: Tilrættað uppskot til nýggja kgl. fyriskipan um havumhvørvi.
Fylgiskjal 2: Avrit av kunngerðum, sum hava heimild í donsku lógini um havumhvørvi. (Burturúrlagdar, sí lovtidende)

Fylgiskjal 3: Viðmerkingar til uppskot til »lov om havmiljøet«, frá 1993. (Burturúrlagdar sí folketingstidende 1992 - 93 A sp. 7277)

Skjal 3

Viðmerkingar til donsku havumhvørvislógina. (Burturúrlagdar sí folketingstidende 1992 - 93 A sp. 7277)

1. viðgerð hósdagin 12. mars 1998. Málið varð heitt í vinnuháttarnevndina.

Málið fall burtur sbr. stýrisskipanarlógini § 15 stk. 3, tí at løgtingsval var 30. apríl 1998, og málið ikki var lidugt viðgjørt á tingi fyri valið.

FL, j.nr. 2710-1/94

99 Uppskot til løgtingslóg um útinning av djóralæknavirksemi v.m.

Ár 1998, hósdagin 5. mars, legði Eilif Samuelsen, landsstýrismaður, vegna Ivan Johannesen, landsstýrismann, vegna landsstýrið fram soljóðandi

Uppskot
til
løgtingslóg um útinning av djóralæknavirksemi v.m.

Øki og endamál lógarinnar

§ 1. Lógin fevnir um djóralæknavirksemi, sum verður útint av djóralæknum og øðrum í sambandi við:
1. ávísan, fyribyrging, viðgerð og verju av sjúku hjá djórum,
2. røkt, kynbót og gjørdari nøring av djórum,
3. aling og framleiðslu av djórum
Stk. 2. Lógin umfatar ikki vanliga røkt og djórahald útint av djóraánarum og hjálparfólki teirra.

§ 2. Endamál lógarinnar er, at:
1. tryggja at djóralæknar og onnur ið verða løggild og góðkend við heimild í hesi lóg, støðugt hava fakkunnleikan og førleikan neyðugan til at útinna fullgott virksemi,
2. tryggja djóraánarum neyðuga djóralæknahjálp,
3. fremja og tryggja neyðugt fakligt samstarv millum djóralæknar og onnur, ið verða løggild ella góðkend við heimild í hesi lóg,
Stk. 2. Endamál lógarinnar er harumframt at djóralæknar í sínum arbeiðsyrki virka fyri, at:
1. varðveita og betra heilsustøðuna hjá djórum,
2. verja og betra trivnaðin hjá djórum,
3. fremja etiskt og umhvørvisliga sømiligt djórahald,
4. tryggja góðskuna á úrdráttum av djóraupprunа,
5. tryggja fólk móti sjúkrahættum, sum stava frá djórum og vistfeingi,

Løggilding av djóralæknum

§ 3. Rætturin til at reka djóralæknavirksemi er treytaður av løggilding sambært nærri av landsstýrismanninum ásettum reglum.
Stk. 2. Landsstýrismaðurin setur eitt veterinert ráð við 3. umboðum at viðgerða av málum um løggilding.
Stk. 3. Ráðið ger starvsskipan, ið skal góðkennast av landsstýrismanninum.
Stk. 4. Ráðið viðgerð umsóknir um:
1. løggilding av djóralækna,
2. avmarkaða løggilding av fólki við aðrari náttúruvísindaligari útbúgving, til at útinna avmarkað djóralæknavirksemi,
3. góðkenning av fólki við aðrari útbúgving, til at útinna sjúkrafyribyrgjing, røkt, nøring o.a.
Stk. 5. Avgerðir hjá veterinera ráðsins kunnu kærast til landsstýrismannin.

Frátøka av løggilding og rættindi

§ 4. Løggildur djóralækni, sum ikki røkir sítt virksemi á fullgóðan hátt vegna groft dugnaloysi, groft ósketni framt fleiri ferðir ella við groft brot á ásetingarnar í hesi lóg, kann missa løggildingina og harvið rættin at virka sum djóralækni.
Stk. 2. Undir samsvarandi umstøðum sum nevndar í stk. 1 kann løggilding djóralæknans skerjast við burturtøku av fylgjandi rættindum:
1. rættin at virka sum praktiserandi djóralækni,
2. rættin at útinna almennar gerðir í sambandi við verju móti sjúkum hjá djórum,
3. rættin at útinna almennar gerðir í sambandi við eftirlit við kjøti, mjólk, eggum, fiski og øðrum vistfeingi
4. rættin at útskriva váttanir,
5. rættin at fyriskipa og útflyggja receptskyldugan heilivág,
6. rættin at fyriskipa og útflýggja rúsandi heilivág,
Stk. 3. Frátøka av løggilding ella rættindum sambært stk. 1 og 2 kann fara fram í einum 1-5 ára tíðarskeiði ella fyribils.

§ 5. Veterinera ráðið viðgerð mál um frátøku av løggilding.
Stk. 2. Landsstýrismaðurin ger nærri reglur fyri viðgerð av málum um løggilding.
Stk. 3. Avgerðir hjá veterinera ráðnum kunnu kærast til landsstýrismannin.

§ 6. Ein løggildur djóralækni kann til landsdjóralæknan fráskriva sær sína løggilding ella rættin til at fyriskipa og útflýggja receptskyldugan heilivág, ella

ávísir partar av hesum. Fráskrivingin kann vera tíðaravmarkað ella varandi.

§ 7. Løggilding ella rættindi, sum ein djóralækni hevur mist við avgerð frá veterinera ráðnum ella við dómi, kunnu fáast aftur eftir umsókn til veterinera ráðið, tá setta tíðarfreistin er farin. Umsóknin verður viðgjørd eftir nærri av landsstýrismanninum ásettum reglum sambært § 3.
Stk. 2. Løggilding ella rættindi, ið ein djóralækni hevur fráskrivað sær, kunnu tó fáast aftur, áðrenn tíðarfreistin er farin. Umsóknin verður viðgjørd eftir nærri av landsstýrismanninum ásettum reglum sambært § 3.

§ 8. Fólk við avmarkaðari løggilding ella aðrari góðkenning koma undir somu reglur, sum eru galdandi fyri løggildar djóralæknar sambært §§ 4-7.

Djóraviðtaluhølir og veterinerar starvsstovur

§ 9. Djóraviðtaluhølir og veterinerar starvsstovur skulu góðkennast av landsstýrismanninum.
Stk. 2. Landsstýrismaðurin ásetur við kunngerð nærri reglur fyri innrætting og arbeiðsfyriskipan á djóraviðtaluhølum og veterinerum starvsstovum undir stk. 1.

Skyldur hjá djóralækna

§ 10. Djóralækni sum fær illgruna um, at djór er fongt við sjúku, ið er fevnd av lóggávu um smittandi sjúkur hjá djórum, skal boða landsdjóralæknanum frá sum skjótast.

§ 11. Djóralækni hevur skyldu óbiðin at upplýsa djóraánara ella umboð hansara um diagnosu, aðrar viðgerðarmøguleikar, sjúkraútlit, møguligar vansar og hjáárin av kanning og viðgerð.
Stk. 2. Djóralækni hevur skyldu, tá brek ella eftirmák koma í sambandi við kanning ella viðgerð av djórinum, at upplýsa djóraánara ella umboð hansara um hetta.

§ 12. Djóralækni hevur eftir umbøn skyldu til skjótast gjørligt at veita neyðuga hjálp til neyðstødd djór.
Stk. 2. Um djóralækni metir, at eitt neyðkomið djór kann flytast, uttan at tess støða verður verri, kann hann krevja, at tað verður flutt til djóraviðtaluhøli.
Stk. 3. Um djóralækni ikki fær farið til eitt neyðkomið djór, vegna veður ella ringar ferðamøguleikar, hevur hann skyldu til at veita djóraánarnum neyðugu leiðbeining og hjálp á annan hátt.
Stk. 4. Neyðkomið djór, ið eru undir illgruna at hava fingið smittandi sjúku sum er fevnd av lóggávu um verju móti sjúkum hjá djórum, skal skjótast gjørligt vitjast í staðnum av tilkallaða djóralæknanum.
Stk. 5. Um djóralækna berst frá við haldgóðari grund, skal hann hjálpa við at vísa á annan djóralækna.

§ 13. Djóralækni hevur skyldu til:
1. at lata landsdjóralæknan vita sín bústað,
2. tá serligar umstøður, ið hava atlit til smittandi sjúku, at átaka sær veterinert arbeiði, sum verður álagt avvarðandi av landsdjóralæknanum, sum liður í verju móti sjúkum hjá djórum,
3. at lata inn frágreiðingar og fráboðanir kravdar av landsdjóratæknanum við atliti til staðfestan av og verju móti sjúkum hjá djórum,
4. at lata landsdjóralæknanum allar upplýsingar um viðurskifti í sambandi við útinnan av sínum djóralæknavirksemi,
5. at grunda sínar frágreiðingar, útalilsir og váttanir á skynsama kanning og føring í sjúkrabók,
6. at goyma sjúkrabøkur og onnur skjøl viðvíkjandi sínum djóralæknavirksemi í minsta lagi í 5 ár.

§ 14. Djóralækni hevur skyldu til av sær sjálvum og uttan óneyðuga seinkan at upplýsa landsdjóralæknan um viðurskifti, ið kunnu vera av týdningi fyri lógargøkið, hesin umsitur.

§ 15. Landsstýrismaðurin kann áseta reglur fyri og krevja ella banna nýtslu av ávísum diagnostiskum tøkni, háttum, hjálpargøgnum, kanningar- og viðgerðarháttum.
Stk. 2. Landsstýrismaðurin kann áseta reglur fyri nýtslu av reseptskyldugum heilivági, og fyri afturhaldstíðarskeið fyri djór og djóraúrdráttum, ið stava frá viðgjørdum djórum.
Stk. 3. Landsstýrismaðurin kann áseta neyvar reglur fyri fyriskipan djóralæknana av nýsandi heilivági, og fyri neyvari skráseting og fráboðan av hesum fyriskipanum.

§ 16. Djóralækni hevur tagnarskyldu um viðskiftarlig og privat viðurskifti, sum avvarðandi fær kunnleika til í sínum djóralæknavirksemi.
Stk. 2. Tagnarskyldan er tó ikki galdandi fyri brot á lóggávuna um reseptskyldugan heilivág, sjúkur og velferð hjá djórum og matvørulóggávuna v.m.
Stk. 3. Tagnarskyldan er ikki galdandi mótvegis

landsdjóralæknan, í tann mun viðurskiftini viðvíkja lógarøki, ið hoyra undir honum.

§ 17. Djóralækni, ið rekur ella er settur í djóralæknavirksemi má ikki reka, vera settur ella hava búskaparlig áhugamál í øðrum virki ella fyritøku sum ger, at gegni hansara sum djóralækni, við atliti til djóranánaran, kann skapa iva ella setast í vanda.
Stk. 2. Djóralækni má ikki reka, vera settur í ella hava búskaparlig áhugamál í apotekuravirki ella øðrum virki sum framleiðir, seltur ella marknaðarførur heilivág, sum apoteksstovnurin hevur burturav.

§ 18. Djóralækni skal tekna trygging móti møguligum endurgjaldskravi í samband við útinnan av djóralæknavirkseminum.
Stk. 2. Tryggingin skal eisini fevna um ta ábyrgd, sum liggur á møguligum starvsfólki hjá avvarðandi djóralækna.

§ 19. Fólk við avmarkaðari løggilding ella góðkenning til at útinna avmarkað virksemi hava somu skyldur sum løggildur djóralækni.

Fyriskipan og útflýggjan av reseptskyldugum heilivági til djór

§ 20. Viðgerð av djórum við reseptskyldugum heilivági kann bert fara fram eftir fyriskipan frá djórlækna. Útflýggjan av fyriskipaðum reseptskyldigum heilivági til viðgerð av djórum kann bert fara fram hjá djóralæknum ella á apoteki.
Stk. 2. Landsstýrismaðurin kann áseta nærri reglur fyri fyriskipan og útflýggjan av reseptskyldugum heilivági til djór og fyri tilevningini av reseptum uppá heilivág frá djóralæknum.

Sáttmálar, samsýningar og gjald fyri tænastuveitingar

§ 21. Landsstýrismaðurin kann gera sáttmálar við djóralæknar viðvíkjandi verju móti sjúkum hjá djórum og um aðrar uppgávur, sum hoyra undir landsdjóralæknaembætið.

Revsireglur

§ 22. Brot á ásetingarnar í hesi lóg verður revsað við bót.
Stk 2. Í kunngerðum givnar við heimild í lógini, kann verða ásett revsing við bót fyri brot á ásetingarnar í kunngerðunum.

Gildiskomureglur

§ 23. Henda lóg kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

Almennar viðmerkingar

Í Føroyum er eingin lóggáva fyri djóralæknavirksemi ella løggilding av djóralæknum. Í januar 1997 setti landsstýrismaðurin eina nevnd at arbeiða við gera uppskot til lóg um útinning av djóralæknavirksemi v.m. í Føroyum. Eisini skuldi nevndin arbeiða við samanleggjing av Heilsufrøðiligu Starvsstovuni og Landsdjóralæknaembætinum, við tí endamáli at gera lógaruppskot til, hvussu øll veterinerviðurskifti kunnu samskipast, soleiðis at trygd kann fáast fyri at ressoursir innan nevnda øki, verða optimalt útnyttaðar.

Uttan at fara í smálutir við hvussu arbeiði hjá nevndini hevur gingið, kann í stuttum verða greitt frá, at nevndararbeiðið sum eftir ætlan skuldi vera liðugt í juni 1997, hevur verið drúgvari enn upprunaliga mett. Tvær nevndir hava verið settar. Tann fyrra var umboða soleiðis: Landsdjóralæknin, í umboð fyri Vinnumálastýrið, í umboð fyri Heilsufrøðiligu Starvsstovuna, í umboð fyri privat virkandi djóralæknar og í umboð fyri bóndafelagið. Tá tað í juni 1997 vísti seg trupult hjá hesi nevndini at koma ásamt um ítøkiliga lóggávu og samskipan av veterinerum viðurskiftunum, avgjørdi landsstýrismaðurin at skifta síðstnevndu umboð t.e. umboðið fyri bóndafelagið og privat virkandi djóralæknar út og setti ístaðin fyri hesar, ein løgfrøðing og eitt umboð fyri løgmansskrivstovuna í nevndina.

Umboðið fyri løgmansskrivstovuna hevur ikki verið direkta knýtt at nevndararbeiðinum; men eitt nú virkað sum ráðgevandi, tá tørvur hevur verið á at fáa lagt yvirmarkar linjur, sum eru tengdar at bygnaðinum innan øki.

Hesi uppskot:

1. Uppskot til løgtingslóg um útinning av djóralæknavirksemi v.m. í Føroyum
2. Uppskot til løgtingslóg um avbøku av Ll. nr. 23 frá 13.03 86 um Heilsufrøðiligu Starvsstovuna

3. Uppskot til kunngerð um avtøku av kunngerð nr. 53 frá 07.07.75 um reglugerð fyri landsdjóralæknan
4. Uppskot til reglugerð fyri Heilsufrøðiligu Starvsstovuna
5. Uppskot til reglugerð fyri Landsdjóralæknaembætið verða at meta sum úrslitið av nevndararbeiðnum.

Ætlanin við lógaruppskotinum um útinning av djóralæknavirksemi v.m. í Føroyum er at seta á stovn eina lóggávu fyri privatum djóralæknavirksemi í Føroyum.

Lógaruppskotið er tilevnað grundað á samsvarandi reglur í øðrum norðanlondum og við atliti til føroyskar umstøður.

Lógaruppskotið er ein rein professiónslóg, sum ásetir reglur fyri tann privata partin av veterinerverkinum, sum fevnir um privatar løggildar djóralæknar og onnur løggild ella góðkend fólk, djóraviðtaluhølir og veteriner laboratorium, hvørt teirra virki er gjørt í privatari ella almennari tænastu. Lógaruppskotið nemur ikki við tann almenna partin av veterinerverkinum undantikið tey viðurskifti sum beinleiðis viðkoma tí privata partinum.

Fyri teir virkandi djóralæknarnar inniber lógaruppskotið, at greiðar reglur verða gjørdar fyri teirra fyriskipan og útflýggjan av reseptskyldugum heitivági til djór og yvir teirra skyldum við atliti til neyðkomin djór og smittandi sjúku hjá djórum ið er fevnd av lóggávu. Fyri djóraánarar inniber lógaruppskotið, at teimum verður tryggjað ta neyðugu djóralæknahjálp og tann neyðuga reseptskylduga heitivág, tá og nær tørvur er á hesum.

Lógaruppskotið hevur ongar beinleiðis búskaparligar avleiðingar fyri hvørki virkandi djóralæknar, djóraánarar ella ta almenna.

Verandi sáttmálar og lógargrundarlag

Eingin lóggáva er í Føroyum um djóralæknavirksemi, men landsstýrið hevur gjørt tveir sáttmálar við privat virkandi djóralæknar. Nevndu sáttmálar eita **»Avtala millum Føroya Landsstýri og Djóralæknatænastuna frá 19.04.1994«** og **»Sáttmáli millum Føroya Landsstýri og Fiskasjúkutænastuna, um tænastuveitingar og gjald fyri hesar frá 31.01.1996«.**

Grannskoðanardeild Landskassans vísur á í ársfrágreiðing fyri 1997 ymiskar fyrispurningar sum grannskoðanardeildin hevur sett landsstýrinum í.s.v. nevndu sáttmálar millum landsstýrið og privatu djóralæknarnar. Millum annað, **»um Djóralæknatænastan/Fiskasjúkutænastan er/verður boðin út almett, so møguliga aðrir djóralæknar hava/fáa líknandi treytir/játtan?«**, ella **»hvørjar reglur tænasturnar skulu fylgja?«** og **»hvat endamállið við samsýningini er og hvussu eftirlitið er við, at samsýningin verður nýtt til tað, hon er veitt?«.**

Vinnumálastýrið metir at fyriliggjandi lógaruppskot er eitt neyðugt reiðskap til at staðfesta hvat endamálið er við útinning av djóralæknavirksemi, og hvørjar reglur verða at galda fyri veterinera økið framyvir og eisini hvør skilnaður er millum almennar og privatar uppgávur.

Lógaruppskotið hevur verið til hoyringar hjá privatu djóralæknunum t.e.: Djóralæknatænastuni, Fiskasjúkutænastuni, Andrass Strøm og deildarleiðara á Heilsufrøðiligu Starvsstovuni sum er útbúgvin djóralækni.

Av innkomnu viðmerkingunum til uppskotið verður generelt gjørt vart við, at skoðbrái hevur verið ov stutt til at gera gjøllar viðmerkingar, men Páll Nielsen hevur sum advokatur fyri Ole Jurgens frá Fiskasjúkutænastuni gjørt viðmerkingar og broytingaruppskot til ávísar greinir í lógaruppskotinum. Hesar eru í høvuðsheitum allar tiknar til eftirtektar og rættnðir inn í fyriliggjandi lógaruppskotið.

Viðmerkingar til einstøku greinirnar

Til § 1. Djóralæknavirksemi sum verður framt av løggildum djóralæknum o.ø. í samband við ásetingarnar

í hesi grein er at skilja sum virksemi ið snýr seg um, at gera diagnostiskar kanningar av djórum ella djóravertum, leggja djór undir skurð ella gera pínslulig inntriv, gera kviðnukanningar, at savna sáð og embryonur, ísáðing, embroytransplantatión og gennamanipilatión av djórum, viðgera djór fyri sjúkur fevndar av galdandi lóggávu fyri sjúkum hjá djórum, viðgera djór fyri sjúkur har veterinert innlit er neyðugt, taka djór í viðgerð við nýtslu av heilivági, froknað sera og vaksinu, hava ella reka djóraviðtaluhølir, hava ella reka veterinerar starvsstovur (laboratorium), hava vistfeingis- og kjøttitsjón, skriva váttanir og ummæli um heilsustøðuna hjá djórum og djóraúrdráttum og gera annað arbeiði har veterinær útbúgving krevst. Greinin fevnir um samlaða virksemi hjá løggildum djóralæknum, øðrum løggildum fólki.

Lógarupplsskotið fer at kunna nýtast til stovnan av góðkenningarskipanum fyri veterinersjúkrasystrar, vaksinatørar, ísáðarar og kleygvskerarum, og fyri laborantar, eftirlitsteknikarar og onnur, ið gera alment eftirlit og umsjón.

Til § 2. Hevur til endamáls at tryggja at djóralæknar og onnur ið verða løggild ella góðkend til at virka innan veterinera økið, hava neyðuga fakliga førleikan til tess at tryggja, at djóraánarar kunnu fáa djóralæknahjálp, tá tørvur er á hesum. Greinin hevur eisini til endamáls at tryggja, at djóralæknar medvirka til at betra heilsu og velferð hjá djórum, fremja etisk og umhvørvislig fullgóð djórahald, og betra góðsku av vistfeingi og verja fólk móti sjúkrahóttanum, ið stava frá vistfeingi og djórum.

Til § 3. Í løtuni eru ongar reglur fyri løggilding av djóralæknum. Grein 3 ásetur at bert løggildir djóralæknar ella fólk við aðrari náttúruvísindarligari útbúgving ið hava fingið góðkenning til tess hava rætt til at reka djóralæknavirksemi. Greinin hevur til endamáls at tryggja at t.d. heilivágsfyritøkur, fóður- ella onnur ið ikki hava veterinerfakliga útbúgving fara at virka sum djóralæknar uttan neyðugan fakliga kunnleika. Landsstýrismaðurin ásetur við kunngerð nærri reglur fyri løggilding, góðkenning og reglur fyri fyri frátøku av løggilding og góðkenning.

Landsstýrismaðurin setur eitt løggildingarráð við 3 umboðum, 1 umboð fyri fróðskaparsetrið, 1 umboð fyri privatpraktiserandi djóralæknar og landsdjóralæknin sum umboð fyri landsstýrið/-mannin. Ráðið ger starvskipan ið skal góðkennast av landsstýrismanninum. Kunngerð um løggilding, góðkenning og frátøku av løggilding og góðkenning verður tilevnað samsvarandi norskum og donskum reglum innan avvarðandi øki.

§§ 4,5,6,7 og 8 eru um frátøku av løggilding og rættindi at virka sum djóralækni um groft dugnaloysi, ósketni framt fleiri ferðir ella álvarslig brot á ásetingar í lógini verður staðfest. Veterinera ráðið viðgerð frátøku av løggildingum og rættindum. Avgerðinar hjá ráðnum kunnu kærast til landsstýrismannin.

Til § 9. Djóraviðtaluhølir og veterinær laboratoriur/starvsstovur skulu góðkennast av landsstýrismanninum og kann landsstýrismaðurin ásetа nærri reglur fyri innrætting, raksturr og arbeiðsfyriskipanum í nevndir hølum. Landsdjóralæknin hevur eftirlit við at ásettar reglur verða fylgdar. Tí møguligt kelda fyri útbreiðan av smittandi sjúku kann ikki verða staðgað um ikki grundleggjandi innrættingar- og reinførisreglur verða hildnar.

Til § 10. Generelt eru reglurnar um skyldur djóralæknana í høvuðsheitinum gjørdar í samsvarð við norskar og danskar reglur á hesum øki. Greinin ásetur at um illgruni er um smittandi sjúku hjá djórum, skal landsdjóralæknin hava fráboðan sum skjótast.

Løggildu djóralæknanir hava ein týdningarmiklan lut »á odda« í eftiransingini og verjuni ímóti sjúkum hjá djórum, og er tað tí avgerðandi at diagnosur teirr eru gjørdar á einum haldgóðum náttúruvísindaligum grundarlagi.

Føroysku djóralæknanir hava uppskot um at fær løggildur djóralækni illgruna um smittandi sjúku hjá djórum fevndar av lóggávu skulu hesir fráboða Landsdjóralæknanum hetta, so hesin skal av- ella ásanna illgrunan.

Hetta er ikki í samsvar við lóggávuna um smittandi sjúkur hjá djórum í hinum norðanlondunum. Hvussu privat praktiserandi djóralæknar og Landsdjóralæknin nágreiniliga skulu bera seg at í sambandi við illgruna og staðfesting av smittandi sjúku, og nær ta almenna skal fíggja møguligar laboratoriukanningar má skipast í eini lóggávu um sjúkur hjá djórum og ikki í eini professiónslóg. Um skyldurnar hjá virkandi djóralæknum viðvíkjandi av- ella ásannan av illgruna um smittandi sjúku, um neyðugt við laboratoriukanningum, verða tikin við í eina professiónslóg, kemst hetta deils av hvussu teirra skylda vanliga er og deils av at skyldan ikki er nóg greitt orðað í galdandi føroysku lóggávu um smittandi sjúkur hjá djórum.

Til § 11. Endamálið við hesi grein er at tryggja, at løggildir djóralæknar upplýsa djóraáfarum nóg væl.

Til § 12. Endamálið við ásetingunum í hesi grein er at tryggja sjúkum djórum og ánarum teirra neyðuga fakliga hjálp tá neyðstøða tekur seg upp.

Reglurnar í hesi grein svara í høvuðsheitinum til tær reglur, ið eru galdandi í Noreg, Danmark og øðrum londum við atliti til skyldur djóralæknana móti neykomnum djórum. Neyðkomin djór er skal skiljast sum, illa meidd djór, djór við pínsluvoldandi sjúkum, djór við burðarforðan, djór við aðrari sjúku har viðgerð er bráneyðug við atliti til lekidóm og velferð, og har viðgerðin krevur veterineran kunnleika, djór ið hava fingið ella eru undir illgruna at hava fingið smittandi sjúku, ið er fevnd av lóggávuni um verju móti sjúkum hjá djórum.

Í stk. 2 verður ásett, at ein djóralækni, sum bevur hentleikar, og sum metir at eitt neyðkomið djór kann flytast uttan at tess støða versnar, kann krevja djórið flutt til viðtaluhøli.

Í stk. 3 er gjørt atlit til, at tær tuplu veður- og ferðaumstøðurnar í Føroyum kunnu forða djóralæknanum at vitja neyðkomin djór. Neyðuga hjálpin má tí veitast á annan hátt av løggilda djóralæknanum, t.d. sum leiðbeining í viðgerðini av djórinum yvir telefon, fax, internetið ella annan nýmótans kunningartøkni.

Í stk. 4 verður ásett, at hóast stk. 3 og 4, so skal ein løggiltur djóralækni altíð skjótast møguligt (tvs. so skjótt ein sleppur avstað fyri veður og ferðumøguleikum) koma til djór, ið hava fingið ella er undir illgruna fyri at hava fingið eina smittandi sjúku, ið er fevnd av lóggávu. Tá tað snýr seg um at av- ella ásanna smittandi sjúku er tað umráðandi, at djóralæknin sjálvur við eygleiðing av skipanini sær hana fyri at gera t.d. rætta kliniska diagnosu, taka vertir av týdningi at vátta diagnosuna, fáa eina beinleiðis fatan av hvussu nógv sjúka er í skipanini, og byrja at gera neyðugu tiltøkini at avmarka smittuna til djór í skipanini, og til aðrar skipanir.

Til §§ 13 og 14. Reglurnar í hesum greinum skulu tryggja, at Landsdjóralæknin kann nýta løggildar djóralæknar sum »oddau« í eini meira aktivari verju móti smittandi sjúkum hjá djórum enn sum nú er. Hetta verður m.a. aktuelt í sambandi við setan á stovn heilsuskipanir innan vanlig húsdjór (seyður og neyt) og innan fiskaaling.

Til § 15. Endamálið við ásetingunum í stk. 1 er, at landsstýrismaðurin skal hava møguleika at kunna banna ella krevja nýtslu av ávísum háttum og tøknum t.d. í sambandi við verju móti smittandi sjúkum hjá djórum, har tað er av alstórum týdningi at taka røttu avgerðina, at teir nýtnu háttir eru vísindarliga grundaðir. Somuleiðis er tað neyðugt við heimild at kunna banna ella krevja ávísar háttir og tøkni við atliti til djóravernd.

Til § 16. Í verandi lóggávu eru ongar reglur um tagnaðarskyldu hjá djóralæknum. Endamálið við tagnaðarskyldoni er at skapa eitt yrkisligt álit millum djóralækna og djóraánara við bæði at verja djóráranum fyrst, at óviðkomandi fáa innlit í »vinnulig loyndarmál« ella onnur búskaparlig/privat viðurskifti, og fyri at verja djóralæknan at verða »kroystan« av forvitni hjá óviðkomandi. Tagnaðarskyldan er ikki galdandi fyri lógarbrot á lóggávuna um reseptskyldugan heilivág, sjúkur og velferð hjá djórum. Tagnaðarskyldan er heldur ikki galdandi móti Landsdjóralæknanum tá tað snýr seg um lógarøkið hesin umsitur.
Til § 17. Henda grein skal saman við ásetingunum um tagnarskyldona hjá løggildum djóralæknum tryggja

eitt álitissamband millum djóraánara og djóralækna. Somuleiðis skulu reglurnar tryggja, at løggildir djóralæknar ikki verða heftir av óviðkomandi fyriliti.

Til § 18. Greinin tilskilar, at privat praktiserandi djóralæknar, ið eru løggildir sambært lógaruppskotinum, og starvsfólk teirra skulu vera levnd av eini ábyrgdartrygging móti tí ábyrgd tey kunnu koma út fyri, annahvørt hetta hendir í privatari tænastu ella meðan almennar uppgávur verða greiddar.

Til § 19. Fólk við avmarkaðari løggilding koma undir somu treytir sum djóralæknar.

Til § 20. Viðgerð av djórum við reseptskyldugum heilivági kann bert fara fram grundað á fyriskipan frá einum løggildum djóralækna. Útflýggjan av respetskyldugum heilivági til djór kann so fara fram antin hjá tí løggilda djóralæknanum ella frá apoteki, her fróknað neyðgoymslum, sum eru undir ábyrgd apotekverksins.

Til § 21. Greinin skapar møguleika fyri, at gera sáttmálar við privat virkandi djóralæknar, deils fyri at tryggja, at djóraánari kann fáa djóralæknahjálp, og deils fyri at tryggja støðuga verju móti sjúkum hjá djórum.

Landsstýrismaðurin kann eftir samráðing við teir virkandi djóralæknarnar áseta upphæddina av samsýning fyri ta arbeiði, ið verður gjørt í sambandi við verju móti sjúkum hjá djórum. Hetta verið seg t.d. fyri almenna verju móti sjúkum hjá djórum, alment eftirlit við kjøt, mjólk, eggum, fiski og annað vistfeingi.

1. viðgerð fríggjadagin 13. mars 1998. Uppskotið varð beint í vinnunevndina.

Málið fall burtur sbr. stýrisskipanarlógini § 15 stk. 3, tí at løgtingsval var 30. apríl 1998, og málið ikki var liðugt viðgjørt á tingi fyri valið.

F.L. j.nr. 1700-6/91

102 Uppskot til løgtingslóg um avtøku av løgtingslóg um Heilsufrøðiligu Starvsstovuna

Ár 1998, hósdagin 5. mars, legði Eilif Samuelsen, landsstýrismaður, vegna Ivan Johannesen, landsstýrismann, vegna landsstýrið fram soljóðandi

Uppskot
til
løgtingslóg um avtøku av løgtingslóg um Heilsufrøðiligu Starvsstovuna

§ 1. Løgtingslóg nr. 23 frá 13. mars 1986 um Heilsufrøðiligu Starvsstovuna verður avtikin.

§ 2. Kunngerð nr. 79 frá 19. apríl 1993 um gjøld fyri tænastur, gjørdar av Heilsufrøðiligu Starvsstovuni, sum broytt við kunngerð nr. 27 frá 1. mars 1994, verður verandi í gildi, til hon verður sett úr gildi.

§ 3. Henda lóg kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

Viðmerkingar

Í januar 1997 setti landsstýrismaðurin eina nevnd at arbeiða við at leggja Heilsufrøðiligu Starvsstovuna og Landsdjóralæknaembætið saman, og við tí endamáli at gera lógaruppskot til, hvussu øll veterinerviðurskifti kunnu samskipast, soleiðis at trygd kann fáast fyri at orka innan nevndu øki, verður brúkt fræsast gjørligt. Nevndin skuldi eisini gera uppskot til lóg um útinning av djóralæknavirksemi í Føroyum.

Uttan at fara í smálutir við hvussu arbeiði hjá nevndini hevur gingið, kann í stuttum verða grein frá, at nevndararbeiðið sum eftir ætlan skuldi vera liðugt í juni 1997, hevur verið drúgvari enn upprunaliga mett.

Tvær nevndir hava verið settar. Tann fyrra var umboðað soleiðis: Landsdjóralæknin, 1 umboð fyri Vinnumálastýrið, 1 umboð fyri Heilsufrøðiligu Starvsstovuna, 1 umboð fyri privat virkandi djóralæknar og 1 umboð fyri bóndafelagið. Tá tað í juni 1997 vísti seg trupult hjá hesi nevndini at koma ásamt um ítøkiliga lóggávu og samskipan av veterinera viðurskiftunum, avgjørdi landsstýrismaðurin at skifta síðstnevndu umboð t.e. umboðið fyri Bóndafelagið og privat virkandi djóralæknanar út og setti ístaðin fyri hesar, ein løgfrøðing og eitt umboð fyri løgmansskrivstovuna í nevndina.

Umboðið fyri løgmansskrivstovuna hevur ikki verið beinleiðis knýtt at nevndararbeiðnum; men einamest virkað sum ráðgevandi, tá tørvur hevur verið á at fáa lagt yvirordnaðar linjur, sum eru tengdar at bygnaðinum innan øki.

Hesi uppskot:

1. Uppskot til løgtingslóg um útinning av djóralæknavirksemi v.m. í Føroyum
2. Uppskot til løgtingslóg um avtøku av Ll. nr. 23 frá 13.03.86 um Heilsufrøðiligu Starvsstovuna
3. Uppskot til kunngerð um avtøku av kunngerð nr. 53 frá 07.07.75 um reglugerð fyri landsdjóralæknan
4. Uppskot til reglugerð fyri Heilsufrøðiligu Starvsstovuna
5. Uppskot til reglugerð fyri Landsdjóralæknaembætið verða at meta sum úrslitið av nevndararbeiðnum.

Í samband við nyskipanina, sum tekur støði í stýrisskipanarlógini, hevur nevndin tikið samband við serkunnleika innan øki. Nevndin hevur verið mælt til ikki at gera serstaka lóg fyri landsdjóralæknaembætið; men ístaðin gera reglugerðir, har uppgávur, leiðsla og ábyrgd hjá ávikavist Heilsufrøðiligu Starvsstovuni og Landsdjóralæknaembætinum eru greitt orðaðar. Hetta til tess at tryggja at onki dupultarbeiði verður útint. Mett verður, at tílíkar einfaldar og greitt orðaðar reglugerðir eru ein fortreyt fyri best møguligari nýtslu av orkuni hjá nevndu stovnum.

Við reglugerðunum leggur landsstýrismaðurin út (útdelegerar) málsnæðið til nevndu stovnar, ið taka fyrisit-

ingarligar avgerðir landsstýrismansins vegna. Eingin ivi verður soleiðis um, at endaliga fyrisitingarliga ábyrgdin er hjá landsstýrismannirnum, og at hesin hevur politisku og rættarligu ábyrgdina av hesi fyrisiting.

Mælt verður tí løgtinginum til at seta úr gildi løgtingslóg um Heilsufrøðiligu Starvsstovuna frá 1986.

1. viðgerð friggjadagin 13. mars 1998. Uppskotið varð beint í vinnunevndina.

Málið fall burtur sbr. stýrisskipanarlógini § 15 stk. 3, tí at løgtingsval var 30. apríl 1998, og málið ikki var liðugt viðgjørt á tingi fyri valið.

F.L. j.nr. 1700-6/91

103 Uppskot til løgtingslóg um gjøld fyri tænastur hjá Heilsufrøðiligu Starvsstovuni og landsdjóralæknaembætinum

Ár 1998, hósdagin 5. mars, legði Eilif Samuelsen, landsstýrismaður, vegna Ivan Johannesen, landsstýrismann, vegna landsstýrið fram soljóðandi

Uppskot
til
løgtingslóg um gjøld fyri tænastur hjá
Heilsufrøðiligu Starvsstovuni og landsdjóralæknaembætinum

§ 1. Landsstýrismanninum verður heimilað at áseta gjøld fyri tænastur hjá Heilsufrøðiligu Starvsstovuni og landsdjóralæknaembætinum.

§ 2. Henda lóg kemur í gildi dagin eftir, at hon er lýst.

Viðmerkingar

Í løtuni verður arbeitt við at gera uppskot til nýggja kunngerð um gjøld fyri tænastur hjá Heilsufrøðiligu Starvsstovuni. Kunngerðin sum er í gildi í løtuni er heimilað í løgtingslóg nr. 23 frá 13. mars 1986 um Heilsufrøðiligu Starvsstovuna. Sum tað sæst av hjálagda er uppskot gjørt um avtøku av lógini um Heilsufrøðiligu Starvsstovuna. Hetta er gjørt í samsvarð við ætlanina um nyskipan á økinum sum m.a. merkir at reglugerðir eru gjørdar fyri Heilsufrøðiligu Starvsstovuna og landsdjóralæknaembætið.

Tá skotið er upp, at lógin sum heimilar kunngerð um gjøld fyri tænastur skal verða avtikin, verður neyðugt at gera serstaka lóg fyri ásetan av gjøldum.

1. viðgerð friggjadagin 13. mars 1998. Uppskotið varð beint í vinnunevndina.

Málið fall burtur sbr. stýrisskipanarlógini § 15 stk. 3, tí at løgtingsval var 30. apríl 1998, og málið ikki var liðugt viðgjørt á tingi fyri valið.

F.L. j.nr. 1700-6/91

104 Uppskot til ríkislógartilmæli um at seta í gildi fyri Føroyar lóg um kirkjuráð

Ár 1998, hósdagin 5. marts, legði Eilif Samuelsen, landsstýrismaður, vegna tvan Johannesen, landsstýrismann, vegna landsstýrið fram soljóðandi

Uppskot
til
ríkislógartilmæli

Mælt verður ríkismyndugleikunum til at seta í gildi fyri Føroyar hjálagda uppskot til kongliga fyriskipan um at seta í gildi fyri Føroyar lóg um kirkjuráð.

Viðmerkingar
Kirkjumálaráðið hevur sent landsstýrinum uppskot til kongliga fyriskipan , sum setur í gildi fyri Føroyar lóg nr. 432 frá 1. juni 1994 um kirkjuráð, sum broytt við lóg nr. 390 frá 22. mai 1996. Umsitingin hjá landsstýrinum hevur viðgjørt uppskot kirkjumálaráðsins, og hevur gjørt broytingar til uppskotið.

Uppskotið tll nýggja lóg um kirkjuráð er seinasti liður í dagtøringini av kirkjulóggávuni í Føroyum í hesum umfari.

Galdandi reglur um kirkjuráð eru í kongligari fyriskipan nr. 232 frá 25. mai 1981, sum setur í gildi fyri Føroyar lóg um kirkjuráð.

Uppskotið fær ongar fíggjarligar avleiðingar fyrt landskassan.

Umframt sjálvt uppskotið til kongliga fyriskipan eru eisini lagdar viðmerkingar og viðmæli frá stiftsstjórn, kirkjustjórn, prestafelagnum og felagnum av kirkjuráðslimum.

Landsstýrið mælir løgtinginum til at samtykkja, at kongliga fyriskipanin, sum setur í gildi fyri Føroyar lóg um kirkjuráð, verður sett í gildi sum niðanfyri tilskilað.

Tær einstøku broytingarnar og viðmerkingar til hesar
Broytingar
Kap. 1.
a) Í § 1 stk. 3 verður "pastoratet" broytt til "præstegældet".
b) Í § 2. stk 1 verður "seks" broytt til " fire ."
c) § 2 stk. 3 verður orðað soleiðis: "Antallet af valgte medlemmer fastsættes af biskoppen efter folketallet i menighedsrådskredsen på grundlag af den opgørelse af folketallet, der offentliggøres af Landsfólkayvirlitið pr. 1. januar i valgåret. Antallet udgør fire for det første hundrede. Er folketallet over hundrede, men under tusind, udgør antallet seks og yderligere et medlem for hvert påbegyndt tusinde, dog ikke over femten i alt. Har to eller flere sogne eller kirkedistrikter fælles menighedsråd, fastsættes antallet af medlemmer efter det samlede folketal på de enkelte sogne eller distrikter i forhold til folketallet i hvert af dem. Ét sogn eller distrikt skal dog have mindst et medlem".

Kap. 2.
d) Í § 6, stk. 2 verða orðini: "jf. § 3 i lov om valg til menighedsråd" broytt til "jf. reglerne omvalg til menighedsråd".
e) Í § 10 stk 1. 1. pkt. verða orðini " der er ansat" strikað.
f) § 10. stk 2. verður orðað soleiðis: "Menighedsrådet vælger af eller uden for sin midte en kasserer. Såfremt kassererforretningerne varetages af en medarbejder ved kirken, bortfalder valget af kasserer. Menighedsrådet kan tegne en kautionsforsikring for kassereren."

g) § 10 stk. 5. verður orðað soleiðis: "Menighedsrådet vælger af sin midte en sekretær, medmindre sekretærhvervet varetages af en medarbejder ved kirken som en del af dennes opgaver".

h) § 10 stk. 6. verður orðað soleiðis: "Menighedsrådet kan blandt de valgte medlemmer vælge en kontaktperson, der bemyndiges til på rådets vegne at give forskrifter og anvisninger til og modtage henvendelser fra medarbejderne ved kirken i tjenstlige forhold. En person, der er medarbejder ved kirken, kan ikke vælges til kontaktperson."

i) § 10 stk. 8, verður strikað.

Kap. 3.

j) I § 19 verður sett aftaná orðini "sognepræst og " : " et eller ".

Kap. 4.

k) § 22 stk. 1 verður orðað soleiðis: "De kirkelige kassers årlige budget og regnskab forelægges i offentlige møder. Bortset herfra bestemmer rådet selv, i hvilket omfang rådets møder skal være offentlige".

l) § 22 stk. 2 verður orðað soleiðis: "Menighedsrådet kan tillade personer der er medarbejdere ved kirken, at overvære behandlingen af sager for lukkede døre. Menighedsrådet kan tilkalde andre personer til at overvære en sags behandling for lukkede døre, når det er ønskeligt af hensyn til sagens oplysning".

m) § 22 stk. stk 3, verður orðað soleiðis: "Menighedsrådet træffer beslutning om, hvornår ordinære møder skal afholdes. Offentlige møder bekendtgøres forud efter menighedsrådets bestemmelse på den på stedet sædvanlige bekendtgørelsesmåde".

n) § 22 stk. 4 verður orðað soleiðis: "Ekstraordinære møder skal afholdes, når menighedsrådets formand, en sognepræst eller mindst en tredjedel af medlemmerne ønsker det. Formanden fastsætter tid og sted for de ekstraordinære møders afholdelse, og offentlige ekstraordinære møder bekendtgøres så vidt muligt forud efter menighedsrådets bestemmelse på den på stedet sædvanlige bekendtgørelsesmåde".

o) § 23 verður strikað.

p) § 24 stk. 4 verður orðað soleiðis: "Menighedsrådet kan selv fastsætte en forretningsorden, der skal godkendes af biskoppen".

q) § 27 stk. 5 verður orðað soleiðis: "En medarbejder ved kirken , der er medlem af menighedsrådet i den menighedsrådskreds, hvor den pågældende er udpeget/ansat, kan ikke deltage i forhandling og afstemning i sager om udpegning/ansættelse af medarbejdere ved kirken og i sager, der angår andre medarbejdere ved kirken".

Kap. 5.

r) I § 32 verður sett aftan á orðini " menighedsrådets vedtægter og": " eventuelle " .

Kap. 6.

s) § 34 stk. 2. verður orðað soleiðis: "Menighedsrådet foretager indstillinger til ledige præstestillinger, administrerer kirken og udpeger/ansætter medarbejdere ved kirken".

Kap. 8.

t) § 43, stk. 3 verða orðini: "Lov om valg til menighedsråd" broytt til "om valg til menighedsråd".

u) § 49 stk. 1 verður orðað soleiðis: "Anordningen træder i kraft den 1. januar 1999. Bestemmelserne i § 2 stk. 1 og stk. 2, § 10 stk. 1, 2. pkt. og § 10 stk. 6, anvendes dog først for de menighedsråd, der vælges ved ordinære valg til menighedsråd i november 2001".

Viðmerkingar

Kap. 1.

a) Málslig rætting.

b) Tá tað í Føroyum eru fleiri smærri kirkjusóknir, skjytir landsstýrið upp at minsta tal av limum í einum kirkjuráði verður ásett til fýra limir í staðin fyri seks limir. Annars verður vist til c.

c) Tá tað í ávísum førum hava verið trupulleikar í teimum smáu kirkjusóknunum við at fáa kirkjuráðið mannað, skjytir landsstýrið upp, at talið á valdum limum í sóknum, har fólkatalið er minni enn 101 verður fýra limir.

Kap. 2.

d) Ásetingin um val til kirkjuráð í galdandi lóg um kirkjuráð verður framvegis galdandi, smb. § 49, stk. 2.

e) Landsstýrið skjytir upp, at til kirkjuverja kunnu ikki veljast hjálpartólk við kirkjuna. óansæð um tey eru sett í starv við kirkjuna, fáa samsyning ella arbeiða sjálvboðin.

f) Landsstýrið skjytir upp, at valið av kassametstara dettur burtur, verður hetta arbeiði rokt av einum hjálparfólki, við kirkjuna, antin hetta er sett í starv við kirkjuna, fær samsyning ella arbeiðir sjálvstøðugt..

g) Landsstýrið skjytir upp, at tað ikki skal vera neydugt hjá kirkjuráðnum at velja skrivara millum ráðslimirnar, verður skrivarastarvið rokt av einum hjálparfólki við kirkjuna sum partur av arbeiði tess, antin hetta er sett í starv við kirkjuna, fær samsyning ella arbeiðir sjálvboðið.

h) Landsstýrið skjytir upp, at nýta hugtakið "Medarbejdere ved kirken" ístaðin fyri "ansatte ved kirken".

i) Landsstýrið skjytir upp, í samsvari við ásetingina í § 24, stk. 1 í uppskoti til lóg um kirkjubygningar, at § 10, stk. 8 verður strikað, av tí at tað er próvstadømisráðið og ikki kirkjuráðið, sum velur ein byggisakkønan til at luttaka í árliga syningini.

Kap. 3.

j) Landsstýrið skjytir upp, vísandi til tað stóra talið av smáum kirkjuráðum í Føroyum, at í teimi nevnd, sum kirkjuráðið skal tilnevna fyri ikkisjálvsognar kirkjur, sita ein sóknarprestur og ein ella tveir av valdu limunum.

Kap. 4.

k) Landsstýrið skjytir upp, at kirkjuráðið sjálvt avger í hvønn mun fundirnir eru almennir. Tó skulu figgjaraetlan og roknskapur hjá kirkjukøssunum leggjast fram á almennum fundi. Orsøkin til hesa broytingina eru tey serligu føroysku viðurskiftini við lutfallsliga nógvum smáum kirkjuráðum, har fundirnir ofta verða lítlutir í privatum húsum.

l) Landsstýrið skjytir upp, at § 23, stk. 2 verður flutt og sett sum § 22, stk. 2 orsakað av samskipanini í lógini.

m) Landsstýrið skjytir upp, at § 22, stk. 2 verður flutt til § 22, stk. 3 vísandi til samskipanina í lógini, og sum ein fylgja av punkti k) verður ásett, at tað bara eru almennir fundir, ið eftir kirkjuráðsins avgerð verða kunngjørdir frammanundan, so sum vanligur kunngerðarháttur er á staðnum.

n) Landsstýrið skjytir upp, at § 22, stk. 3 verður flutt til § 22, stk. 4, vísandi til samskipanina av lógini og sum ein fylgja av punkti k) eru tað bara almennir eykafundir, ið verða kunngjørdir frammanundan eftir avgerð kirkjuráðsins, so sum vanligur kungerðarháttur er á staðnum.

o) Landsstýrið skjytir upp, at § 23 verður strikað, av tí at ásetingarnar eru flutlar til § 22.

p) Landsstýrið skjytir upp, at kirkjuráðið sjálvt tekur avgerð um gerast skal ein fundarskipan. Um so er, at fundarskipan verður gjørd, skal hendan góðkennast av bispi.

q) Landsstýrið skjytir upp, at lógin allastaðir nýtir hugtakið "medarbejdere ved kirken". Somuleiðis skjytir landsstýrið upp, at ásetingin í § 27, stk. 5 er galdandandi fyri øll hjálparfólk við kirkjuna, óansæð um hesi arbeiða sjálvboðin, fáa samsyning ella eru sett í starv við kirkjuna.

Kap. 5.

r) Landsstýrið skjytir upp sum eina fylgju av p), at orðið "eventuelle" verður sett inn áðrenn orðið "forretningsorden".

Kap. 6.

s) Landsstýrið skjytir upp, at § 34, stk. 2 verður orðað soleiðis, at lagt verður upp fyri, at meginparturin av teimum føroysku kirkjuráðunum ikki hava heimild til at seta hjálparfólk við kirkjuna, men kunnu tilnevna hjálparfólk, ið fáa samsyning ella arbeiða sjálvboðin.

Kap. 8.

t) Ásetingarnar um val til kirkjuráð í galdandi lóg um kirkjuráð verða framvegis galdandi smb. § 49, stk. 2.

u) Landsstýrið skjytir upp, at fyriskipanin fær gildi frá 1. januar 1999.

Skjøl

1. Uppskot landsstýrisins til kongaliga fyriskipan sum setir í gildi fyri Føroyar "Lov om menighedsråd".
2. Hjálagt uppskot frá kirkjumálaráðnum til kongaliga fyriskipan um at seta í gildi fyri Føroyar "lov om menighedsråd" við viðmerkingum.
3. Fylgisskjøl frá kirkjumálaráðnum.
4. Viðmerkingar hjá stiftsstjórn, kirkjustjórn, prestafelagnum og felagnum av kirkjuráðslimum.

Skjal 1.

Anordning om ikrafttræden på Færøerne af lov om menighedsråd
(Uppskot landsstýrisins)

I medfør af § 50 i lov nr. 432 af 1. juni 1994 om menighedsråd, som ændret ved lov nr. 390 af 22. maj 1996, bestemmes, at loven skal gælde for Færøerne i følgende affattelse:

Kapitel 1
Almindelige bestemmelser

§ 1. Sognets eller kirkedistriktets anliggender styres af menighedsrådet, medmindre andet er særligt hjemlet i lovgivningen.
Stk. 2. Er der flere kirker i et sogn, og er der til hver kirke henlagt et særskilt distrikt, vælges et menighedsråd for hvert distrikt.
Stk. 3. Menighedsrådene i et præstegæld med to eller flere sogne eller i et sogn med to eller flere kirkedistrikter kan beslutte, at præstegældet eller sognet skal have fælles menighedsråd, når et menighedsmøde, jf. kapitel 7, i hvert af sognene eller distrikterne ønsker det.
Stk. 4. Ved oprettelse af et nyt sogn eller kirkedistrikt kan biskoppen bestemme, at det nye menighedsråd skal oprettes, før oprettelsen af sognet eller distriktet træder i kraft, og fastsætte, hvilke opgaver rådet skal varetage indtil dette tidspunkt.
Stk. 5. Ved oprettelse af et nyt sogn eller kirkedistrikt kan menighedsrådet for den del af sognet eller distriktet, der bliver tilbage, beslutte, at der skal afholdes nyvalg. Beslutningen skal være truffet, før oprettelsen af det nye sogn eller distrikt træder i kraft.

Tá tíðin fyri, at Landsstýrið skal hava broytingaruppskotini í hendi er sera knøpp, fara vit í fyrsta lagi at heita á Landsstýrið, um tað er møguleiki fyri at fáa útsett hesa framløgu til tilsøkutingsetuna, so betri møguleiki verður til at kom við viðmerkingum og broytingaruppskotum, sum felagið og limir tess meta vera neyðugar.

Í øðrum lagi, um hendan útsetan ikki letur seg gera, so at geva felagnum møguleika fyri at koma við viðmerkingum og broytingaruppskotum aftaná 16. mars, tá ársaðalfundurin er gjørdur kunnugur við hesar nýggju lógir, sum í mongum førum eru bæði nýskapandi og kallveitandi samanett við verandi lógir.

Tá Felagið fyri kirkjuráðslimir longu nú umboðar stóran part av presturm og leikum fólkum, sum eru tilknýtt til fólkakirkjuna, so vóna vit, at hendan áheitan verður gingin okkum á møti.

Heilsan Vegna Felagið fyri kirkjuráðslimir
Nikals Flodbo, formaður og Per Jacobsen, næstformaður

7. mars. 1996 EL.j.nr. 2000-6 94

Toftir 17.08.96
Føroya Landsstýri, Tinganes, 100 Tórshavn

Viðvíkjandi fyriliggjandi uppskoti til boytingar í nýggju kirkjalógunum fyri Føroyar.
Vísandi til skriv tykkara frá 6. juli 1996 j.nr. 2060- 1/90 JN /pm við viðmerkingum til lógaruppskotið, so hevur nevndin av nýggjum viðgjørt uppskotið í ljósi av hesum viðmerkingum.

Ummæli og viðmerkingar:

1. Lov om folkekirkens økonomi § 21 og 23

Tað eru kirkjur, ið hava fingið gávur og sokallað fonds ella legat, sum kirkjuráðið skal umsita, til rakstur, serlig tiltøk ella nýbygging. Henda myndugleika eigur kirkjuráðið framvegis at hava, tí hann var treytaður tá gávan var givin.

2. Lov om menighedsråd kap. 4

Viðvíkjandi § 22 stk. 6 um fleugs fundir hendir í summum prestagjøldum ein boyting í mun til galdandi tannagongd. Mælt verður tí til, at í staðin kemur at standa: "Formaðurin í krikjuráðnum í tí sókn har ministeralbøkurnar verða førdar."

Viðvíkjandi § 23 stk. 1 um opnar kirkjuráðsfundir ynskir felagið sum ískoyti til skriv okkara frá 2-1. febr. 1996 at vísa á, at í staðin fyri at allir kirkjurásfundir eru opnir, kundi sama skipan verið galdandi sum fyri proóstadømisráð. (samb. kap 6 § 24 stk 3 í Lov om folkekirkens økonomi)

Eisini eru tey skrivligu krøvini í § 22 stk 5, 2 og 4, ið fyrisitingarliga vera sett til kirkjuráðini, av slíkum slag, at ivasamt er um tey vera eftirlíkað.

Sum dømi kunnu nevnast:
a. At fastleggja fundirnar fyri alt árið og kunngera teir.
b. At kunngera málini, ið viðgeraast skulu, á ávísum almennum staði.

c. At gera yvirlit yvir viðgjørd mál og tiknar avgerðir.
d. At føra í gerðabók hvussu hør einstakur hvur atkvøtt, og at kunngera hetta alment.

Verður lóggivið og kravt sum í fyriliggjandi uppskoti, verður avleiðingin, at fólk skal setast til hetta arbeiði, tí stórur partur av kirkjuráðunum kring landið fer at aftra seg við at gera tað.

Henda fremmandageran av kirkjuni vil neyvan gagna luttøkuni av kirkjugangarum, og samanbera vit okkara kirkju við ta donsku, so er stórur munur á luttøkuni.

Í donsku kirkjuni, har bæði kirkjutænarar og tey ið fyrisita eru lønt starvsfólk, kanst tú seta tey krøv tú vilt. Men í okkara kirkju, har stórt sæð alt arbeiðið verður gjørt sum sjálvboðið tænastuarbeiði, mugu vit skoyta eitt sindur til hvat hesi fólk sjálv meina.

Nevndin staðfestir annars fyrru skrivini til Føroya Landsstýri dagfest 4. febr. og 7. juni 1996.
Um tað er ynskiligt, eru vit altið fúsir at møta til fundar hjá tykkum.

Við heitsan Felagið fyri Kirkjuráðslimir Nikals Foldbo form.

20. august. 1996
F.L.j.nr. 2060- 1/90

1. viðgerð friggjadagin 13. mars 1998. Uppskriið verð beint í mentanarnevndina.

Málið fall burtur sbr. stýrisskipanarlógini § 15 stk. 3, tí at løgtingsval var 30. apríl 1998, og málið ikki var liðugt viðgjørt á tingi fyri valið.

F.L. j.nr. 2000-10/96

105 Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um umhvørvisvernd

Ár 1998, hósdagin 5. mars, legði Eilif Samuelsen, landsstýrismaður, vegna landsstýrið fram soljóðandi

Uppskot
til
løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um umhvørvisvernd

§ 1.

Í løgtingslóg nr. 134 frá 29. oktober 1988 um umhvørvisvernd verður gjørd henda broyting:
§ 37, stk. 1, 2 pkt. verður orðað soleiðis:
"Útpantningsrættur er fyri útreiðslum, sum myndugleikin hevur krav uppá."

§ 2.

Henda lóg kemur í gildi dagin eftir, at hon er lýst.
Stk. 2. Samstundis verður danski teksturin í lógini strikaður.

Viðmerkingar

Í § 37, stk. 1 í løgtingslóg um umhvørvisvernd er ásett, at um boð ella forboð, givin við heimild í lógini, ikki verða lydd innan ásetta freist, kann eftirlitsmyndugleikin, láta atgerðina framja fyri rokning tess, ið ábyrgdina hevur. Viðari verður sagt, at útreiðslurnar verða hornar av avvarðandi ogn.

Broytingaruppskotið skapar møguleika fyri, at tað uttan dóm, kann gerast útlegg í eigindómi hjá persónum sum skyldan áliggur.

1. viðgerð hósdagin 12. mars 1998. Uppskotið varð beint í trivnaðarnevndina.

Málið fall burtur sbr. stýrisskipanarlógini § 15 stk. 3, tí at løgtingsvalið var 30. apríl 1998, og málið ikki var liðugt viðgjørt á tingi fyri valið.

K.L.j.nr. 2700-5/90

106 Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um fólkaskúlan

Ár 1998, hósdagin 5. mars, legði Eilif Samuelsen, landsstýrismaður, vegna landsstýrið fram soljóðandi

Uppskot
til
løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um fólkaskúlan

§ 1.

Í løgtingslóg nr. 125 frá 20. juni 1997 um fólkaskúlar verða gjørdar hesar broytingar:

1. Í § 4, stk. 5 verða orðini: "Landsstýrismaðurin ásetur reglur um 3., 4. og 5. stk. og kann í tí sambandi víkja frá teimum í §§ 5, 7, 8 og 9 og § 14, 3. — 6. stk." broytt til: "Landsstýrismaðurin ásetur reglur um stk. 3, 4 og 5 og kann í tí sambandi víkja frá teimum í §§ 5, 7, 8 og 9 og § 14, stk. 3 — 6."
2. Í § 5, stk. 6 verða orðini: "og kann hann í hesum sambandi víkja frá § 5, 1. - 4. stk., §§ 7, 9 og 19, 1., 2., 3. og 5. stk. og § 26, 1. stk." broytt til: "og kann hann í hesum sambandi víkja frá § 5, stk. 1 — 4, §§ 7, 9 og 19, stk. 1, 2, 3 og 5, og § 26, stk. 1".
3. Í § 9, stk. 3 verða orðini: "eitt styttri tíðarskeið, smb. § 18, 6. stk." broytt til: "eitt styttri tíðarskeið, smb. § 18, stk. 6."
4. Í § 9, stk. 5 verða orðini: "teimum, sum standa í 1. stk., eins og honum er heimilað at áseta gjøllari reglur eftir 2. og 4. stk. og at senda út" broytt til: "teimum, sum standa í stk. 1, eins og honum er heimilað at áseta gjøllari reglur eftir stk. 2 og 4 og at senda út".
5. Í § 12 stk. 2 verða orðini: "Serundirvísing sambært § 4, 3. stk., ið ikki er" broytt til: "Serundirvísing sambært § 4, stk. 3, ið ikki er".
6. Í § 12, stk. 3 verða orðini: "val av lærugreinum smb. §§ 7 og 9, 1. - 4. stk. um framhaldandi skúlagongd." broytt til: "val av lærugreinum smb. §§ 7 og 9, stk. 1 — 4 um framhaldandi skúlagongd."
7. Í § 13, stk. 2 verða orðini: "tvørtur um floksbýtið, smb. § 30, 4. stk." broytt til: "tvørtur um floksbýtið, smb. § 30, stk. 4."
8. Í § 13, stk. 4 verða orðini: "at gera frávik frá meginreglunum í 3. stk." broytt til: "at gera frávik frá meginreglunum í stk. 3."
9. Í § 14 stk. 3 verða orðini: "støða teirra í royndarlærugreinunum, smb. § 16, 2. — 6. stk. lýst við talmetum" broytt til: "støða teirra í royndarlærugreinunum, smb. § 16, stk. 2 — 6 lýst við talmetum".
10. Í § 14 stk. 5 verða orðini: "við skrivligum ummæli, smb. tó § 67, 4. stk." broytt til: "við skrivligum ummæli, smb. tó § 67, stk. 4."
11. Í § 15, stk. 1 verða orðini: "Næmingar, sum fara úr skúlanum eftir 7. floksstig, smb. § 41, 3. stk., ella seinni," og "og møgulig royndarnet, smb. § 16, 2. — 6. stk." broytt til ávikavist: "Næmingar, sum fara úr skúlanum eftir 7. floksstig, smb. § 41, stk. 3, ella seinni." og "møgulig royndarmet, smb. § 16, stk. 2 — 6".
12. § 16, stk. 1 verður strikað.
13. Í § 16, stk. 4 verða orðini: "til viðkaðu fráfaringarroynd eftir 3. stk., fara til fráfaringarroynd eftir 2. stk." broytt til: "til viðkaðu fráfaringarroynd eftir stk. 3, fara til fráfaringarroynd eftir stk. 2."
14. Í § 16, stk. 8 verða orðini: "lærugreinum, sum nevndar eru í 2. — 5. stk." broytt til: "lærugreinum, sum nevndar eru í stk. 2 — 5."
15. Í § 18, stk. 5 verða orðini: "víkja frá ásetingunum í 3. stk., eins og honum er" broytt til: "víkja frá ásetingunum í stk. 3, eins og honum er".
16. Í § 18, stk. 6 verða orðini: "árliga í 1. - 7 skúla

ári," og "„sum neyðugt er sambært § 9, 3. stk." broytt til: "árliga í 1. — 7. skúlaári," og ", sum neyðugt er sambært § 9, stk. 3."

17. Í § 19, stk. 6 verða orðini: "víkja frá ásetingunum í 1. - 5. stk." broytt til: "víkja frá ásetingunum í stk. 1 — 5."
18. Í § 22, nr. 3 verða orðini: "Undirvísing eftir § 4, 3. — 7. stk." broytt til: "Undirvísing eftir § 4, stk. 3 — 7."
19. Í § 23, stk. 1 verða orðini: "til undirvísing í frítíðini eftir § 4, 6. stk.," og "vavið av undirvísingarmiðlum eftir 1. pkt." broytt til ávikavist: "til undirvísing í frítíðini eftir § 4, stk. 6." og "vavið av undirvísingarmiðlum eftir nr. 1."
20. Í § 23. stk. 2 verða orðini: "Í hvørjum skúla smb. § 30, 1. stk. verður skipað" broytt til: "Í hvørjum skúla smb. § 30, stk. 1 verður skipað".
21. Í § 25, stk. 1 verða orðini: "tí einstaka skúlanum í boði at royna, smb. § 58, 1. stk." broytt til: "tí einstaka skúlanum í boði at royna, smb. § 58, stk. 1."
22. Í § 25, stk. 2 verða orðini: "og ráðgevingarligan stuðul eftir 1. stk." broytt til: "og ráðgevingarligan stuðul eftir stk. 1."
23. Í kapittli 3 verður yvirskriftin: "Skipanin av skúlaverkinum" broytt til: "Skipanin".
24. Í § 26, stk. 1 verða orðini: "veitt sernámsfrøðilig hjálp, smb. § 4, 3. og 4. stk." broytt til: "veitt sernámsfrøðilig hjálp, smb. § 4, stk. 3 og 4."
25. Í § 26, stk. 5 verða orðini: "loyva, at ásetingarnar í 1. og 4. stk. eisini eru" broytt til: "loyva, at ásetingarnar í stk. 1 og 4 eisini eru"
26. Í § 27, stk. 2 verða orðini: "sáttmálar, sum nevndir eru í 1. stk." broytt til: "sáttmálar, sum nevndir eru í stk. 1."
27. Í § 27, stk. 6 verða orðini: "børn og ung undir 18 ár, smb. § 26, 1. stk." broytt til: "børn og ung undir 18 ár, smb. § 26, stk. 1."
28. Í § 28, stk. 2 verða orðini: "skipað undirvísing eftir 1. stk. á teimum sjúkrahúsum" broytt til: "skipað undirvísing eftir stk. 1 á teimum sjúkrahúsum".
29. Í § 28, stk. 3 verða orðini: "Landsstýrismaðurin ger reglur um undirvísing eftir 1. og 2. stk. Landskassin rindar læraralønir fyri undirvísing eftir 1. og 2. stk. eins og læraralønir annars. Kommunustýrið ber aðrar útreiðslur í sambandi við undirvísing eftir 1. stk. Útreiðslurnar av undirvísingarmiðlum eftir 2. stk. vera rindaðar úr landskassanum í tann mun, stovnurin ikki letur tilfarið." broytt til: "Landsstýrismaðurin ger reglur um undirvísing eftir stk. 1 og 2. Landskassin rindar læraralønir fyri undirvísing eftir stk. 1 og 2 eins og læraralønir annars. Kommunustýrið ber aðrar útreiðslur í sambandi við undirvísing eftir stk. 1. Útreiðslurnar av undirvísingarmiðlum eftir stk. 2 vera rindaðar úr landskassanum í tann mun, stovnurin ikki letur tilfarið."
30. Í § 29, stk. 1 verða orðini: "enn fyri tey yngru, smb. tó § 31, 1. stk." broytt til: "enn fyri tey yngru, smb. tó § 31, stk. 1."
31. Í § 29, stk. 2 verða orðini: "Undirvísing sambært § 4, 3. — 5. stk. kann vera" broytt til: "Undirvísing sambært § 4, stk. 3 — 5 kann vera".
32. Í § 29, stk. 3 verða orðini: "Undirvísing sambært § 4, 3. 5. stk., §§ 5, 7 og 9 kann verða" og "sum sett er í undirvísingarætlanini, smb. § 22, 1. stk. nr. 1." broytt til ávikavist: "Undirvísing sambært § 4, stk. 3 — 5, §§ 5, 7 og 9 kann verða" og ", sum sett er í undirvísingarætlanini, smb. § 22, stk. 1, nr. 1."
33. § 30, stk. 3 verða orðini: "vegna val av lærugreinum eftir § 12, 3. stk." broytt til: "vegna val av lærugreinum eftir § 12, stk. 3."
34. Í § 31, stk. 2 verða orðini: "Greiniligari reglur um samarbeiði, um val av stýri" og "sum landsstýrismaðurin góðkennir" broytt til: "Greiniligari reglur um samarbeiði, um val av felagskommunustýri og felagsskúlastýri" og "sum landsstýrismaðurin góðkennir, smb. § 57, stk. 5."
35. Í § 32, stk. 1 verða orðini: "fyri kommununnar skúlaverk, smb. § 47, 6. stk." broytt til: "skúlan/-skúlanar í kommununi", smb. § 47, stk. 6."
36. Í § 32, stk. 1, nr. 4 verða orðini: "Undirvísing á stovnum í økinum, smb. § 28, 2. stk." broytt til: "Undirvísing á stovnum í økinum, smb. § 28, stk. 2."
37. Í § 33, stk. 6 verða orðini: "Ásetingarnar í 1. stk. umfata ikki næmingar, ið sambært § 26, 4. stk. verða undirvístir" broytt til: "Ásetingarnar í stk. 1 umfata ikki næmingar, ið sambært § 26, stk. 4 verða undirvístir".
38. Í § 33, stk. 7 verða orðini: "Tær flutningsskipanir, ið kommunustýrið hevur gjørt sambært 1., 3. og 4. stk., skulu góðkennast av landsstýrismanninum." broytt til: "Tær flutningsskipanir, ið kommunustýrið hevur gjørt sambært stk. 1, 3 og 4, skulu góðkennast av landsstýrismanninum."
39. Í § 33, stk. 8 verða orðini: "útreiðslunum til góðkendar flutningsskipanir eftir 1. stk." broytt til:

"útreiðslunum til góðkendar flutningsskipanir eftir stk. 1."

40. Í § 33, stk. 9 verða orðini: "Landsstýrismaðurin kann í serstøkum føri víkja frá reglunum í 1. — 6. stk., eins og hann" og "sum útreiðslur av næmingaflutningi eftir 1. — 3. stk., um so er" broytt til ávikavist: "Landsstýrismaðurin kann í serstøkum føri víkja frá reglunum í stk. 1 — 6, eins og hann" og "sum útreiðslur av næmingaflutningi eftir stk. 1 — 3, um so er".
41. Í § 34, stk. 2 verða orðini: "bert kunnu fáa ta í § 4, 4. — 5. stk. umrøddu undirvísing" broytt til: "bert kunnu fáa ta í § 4, stk. 4 — 5 umrøddu undirvísing"
42. Í § 34, stk. 3 verða orðini: ", skipa fyri, at teir í 1. og 2. stk. nevndu næmingar verða" broytt til: ", skipa fyri, at teir í stk. 1 og 2 nevndu næmingar verða"
43. Í § 34, stk. 6 verða orðini: "Tilskotið eftir 1. — 5. stk. verður veitt úr landskassanum." broytt til: "Tilskotið eftir stk. 1 — 5 verður veitt úr landskassanum."
44. Í § 35, stk. 1 verða orðini: "ella á donskum læraraskúla, smb. tó 2. og 3. stk., ella aðra læraraútbúgving" broytt til: "ella á donskum læraraskúla, smb. tó stk. 2 og 3, ella aðra læraraútbúgving".
45. Í § 36, stk. 1 verða orðini: "Til at røkja undirvísing í fritíðini eftir § 4, 5. stk. ella aðrar náms frøðiligar" broytt til: "Til at røkja undirvísing í fritíðini eftir § 4, stk. 5 ella aðrar námsfrøðiligar"
46. Í § 41. stk. 3 verða orðini: "ella undirvísingartilboði sambært § 9, 2. stk., um so er,"broytt til: "ella undirvísingartilboði sambært § 9, stk. 2, um so er,"
47. Í § 41. stk. 4 verða orðini: "Landsstýrismanninum er heimilað at áseta gjøllari reglur eftir 2. og 3. stk." broytt til: "Landsstýrismanninum er heimilað at áseta gjøllari reglur eftir stk. 2 og 3."
48. Í § 42, stk. 3 verða orðini: ", at undirvísingarskyldan eftir 1. stk. er byrjað" broytt til: ", at undirvísingarskyldan eftir stk. 1 er byrjað"
49. Í § 42, stk. 4 verða orðini: "Eitt barn skal. um kommuna sambært § 4, 2. stk. hevur sett forskúlaflokk" broytt til: "Eitt barn skal. um kommuna sambært § 4. stk. 2 hevur sett forskúlaflokk"
50. Í § 42, stk. 5 verða orðini: "Eftir 4 stk. skulu somuleiðis børn" broytt til: "Eftir stk. 4 skulu somuleiðis børn"
51. Í § 45, stk. 1 verða orðini: ", taka lut í undirvísingini, smb. § 55, 5. stk." broytt til: ", taka lut í undirvísingini, smb. § 55, stk. 5."
52. Í kapittli 6 verður yvirskriftin "Fyrisitingin av skúlaverkinum" broytt til "Fyrisitingin"
53. Í § 46 verða orðini: "smb. § 50, 1. stk." broytt til: "Sí eisini § 31."
54. Í § 47, stk. 2 verða orðini: "verða innskrivað í fólkaskúlan, smb. § 44, 1. stk." broytt til: "verða innskrivuð í fólkaskúlan, smb. § 44, stk. 1"
55. Í § 47, stk. 3 verða orðini: "um felags undirvísing, smb. § 27, 1. stk." broytt til: "um felags undirvísing, smb. § 27, stk. 1."
56. Í § 47, stk. 5 verða orðini: "umbygging av verandi skúlum, smb. § 57, 4. stk." broytt til: "umbygging av verandi skúlum, smb. § 57, stk. 4."
57. Í § 47, stk. 6 verða orðini: "og broytingar í honum, smb. §§ 32, 1. stk. og 57, 5. stk." broytt til: "og broytingar í honum, smb. §§ 32, stk. 1 og 57, stk. 5."
58. Í § 48, stk. 1 verða orðini: "fyrisitingina av kommununnar skúlaverki" broytt til: "fyrisitingina av skúlanum/skúlunum í kommununni".
59. Í § 48, stk. 1, nr. 2 verða orðini: "Tilnevning av møguligum kommunustýrislimi til skúlastýrið, smb. § 50, 4. stk." broytt til: "Tilnevning av møguligum kommunustýrislimi til skúlastýrið, smb. § 50, stk. 5."
60. Í § 48, stk. 1 verður sum nýtt nr. 5 sett inn: "Starvsskipan fyri skúlastýrið".
61. § 49 verður strikað.
62. § 50 verður orðað soleiðis:

"§ 50. Eitt skúlastýri skal verða valt til hvønn sjálvstøðugan skúla í kommununi, sum í minsta lagi hevur 20 næmingar og 2 lærarar.

Stk. 2. Limir tess skulu vera:

5 ella 7. (smb. § 51, stk. 3) foreldraumboð, ið skulu verða vald av teimum og ímillum teirra, ið hava foreldramyndugleikan yvir teimum børnum, sum eru skrivað inn í skúlan.

2 umboð fyri lærarnar og hini samstarvsfólkini, ið skulu verða vald av samstarvsfólkum skúlans og ímillum teirra.

2 umboð fyri næmingarnar, ið skulu verða vald av tæningum skúlans og ímillum teirra, smb. tó stk. 3.

Stk. 3. Í skúlum, sum bert hava 5 tey fyrstu flokksstigini, verður einki næmingaumboð í skúlastýrinum.

Stk. 4. Í skúlum, ið hava minni enn 20 næmingar, eru limir tess 2 ella 3 foreldraumboð og skúlaleiðarin. Í hesum føri hevur skúlaleiðarin atkvøðurætt.

Stk. 5. Kommunustýrið kann eftir áheitan frá

skúlastýrinum gera av, at ein av limum tess er við á skúlastýrisfundi uttan atkvøðurætt.

Stk. 6. Næmingaumbnðini hava ikki atkvøðurætt.

Stk. 7. Formaðurin í skúlastýrinum skal verða valdur ímillum foreldraumboðini.

Stk. 8. Skúlaleiðarin er skrivari í stýrinum og er við á stýrisfundi uttan atkvøðurætt, smb. tó stk. 4.

Stk. 9. Valskeiðið hjá foreldraumboðunum er vanliga 3 ár. Valskeiðið hjá hinum limunum er 1 ár. Tey fólk, sum eru sett í starv í skúlanum, kunnu ikki vera foreldravaldir limir í skúlastýrinum.

Stk. 10. Næmingaumboðini skulu ikki vera við á fundi, tá ið mál viðvíkjandi einstøkum næmingum ella lærarum vera umrødd.

Stk. 11. Í teimum kommunum, har undirvísing skúlans fer fram í skúlaeindum, sum bølisliga eru spjaddar í skúlaøkinum, eiga foreldraumboðini at verða vald soleiðis, at í minsta lagi 1 foreldraumboð verður valt fyri hvørja skúlaeind."

63. Í § 51, stk. 1 verða orðini: "reglugerð um fyrisitingina av kommununnar skúlaverki." broytt til: "reglugerð um fyrisitingina av kommununnar skúlaskapi".

64. § 51 stk. 3 verða orðini "Har fleiri skúlar eru í somu kommunu, eru kommunustýrisumboðini umboð í øllum skúlastyrunum. Eru fleiri enn 2 skúlar í kommununi, kann kommunustýrið velja 2 umboð aftrat fyri hvørjar tveir skúlar, sum eru í kommununi." broytt til: "Landsstýrismaðurin kann áseta eftir gjøllari reglum, at talið á foreldraumboðum verður økt við 2 limum í skúlastýrinum/felagsskúlastýrinum, smb. § 31, stk. 2."

65. § 51, stk. 4 verða orðini: "úr fólkaskúlanum, smb. § 44, 2. stk." og "at vera skúlastýrislimur ella foreldraumboðslimur", broytt til: "úr fólkaskúlanum, smb. § 44, stk. 2" og "at vera limur í skúlastýrinum".

66. Í § 52, stk. 2 verða orðini: "enn ásett er í fíggjarætlanini, smb. § 47, 4. stk." broytt til: " " enn ásett er í fíggjarætlanini, smb. § 47, stk. 4."

67. Í § 52, stk. 3 verða orðini: "uppskot um skúlabygging/-umbygging, smb. § 47, 5. stk." og "at viðgera uppskot um skúlabygging/-umbygging, smb. § 57, 4. stk." broytt til ávikavist: " uppskot um skúlabygging/ umbygging, smb. § 47, stk. 5" og "at viðgera uppskot um skúlabygging/-umbygging, smb. § 57, stk. 4."

68. Í § 52, stk. 4 verða orðini: "og broytingar í honum, smb. § 32, 1. stk." og "um skúlabygnaðin í viðkomandi skúla, smb. § 47, 6. stk." broytt til ávikavist: " og broytingar í honum, smb. § 32, stk. 1." og " um skúlabygnaðin í viðkomandi skúla, smb. § 47, stk. 6."

69. Í § 53, stk. 1 verða orðini: "Skúlastýrið ásetur meginreglurnar um virksemi skúlans, smb. § 55, 4. stk." broytt til: "Skúlastýrið ásetur meginreglurnar um virksemi skúlans, smb. § 55, stk. 4".

70. Í § 55, stk. 1 verða orðini: "verður leiðari settur" og "lærari samstundis leiðari skúlans." broytt til: "verður skúlaleiðari settur" og "lærari samstundis skúlaleiðari."

71. Í § 55, stk. 2 verða orðini: "Skúlaleiðarin hevur ta fyrisitingarligu og námsfrøðiligu leiðsluna av skúlanum og ábyrgdina av virksemi skúlans mótvegis skúlamyndugleikunum á staðnum" broytt til: "Undir ábyrgd skúlamyndugleikanna hevur skúlaleiðarin ta fyrisitingarligu og námsfrøðiligu leiðsluna av skúlanum og ábyrgdina av virksemi skúlans."

72. Í § 55, stk. 4 verða orðini: "meginreglurnar fyri virksemi skúlans, smb. §§ 53, 1. stk. og uppskot um fíggjarætlan skúlans, smb. §§ 52, 2. stk., innan fyri teir fíggjarligu karmar, sum kommunustýrið hevur ásett, smb. § 47, 4. stk." broytt til: "meginreglurnar fyri virksemi skúlans, smb. § 53, stk. 1 og uppskot um fíggjarætlan skúlans, smb. § 52, stk. 2, innan fyri teir fíggjarligu karmar, sum kommunustýrið hevur ásett, smb. § 47, stk. 4."

73. Í § 56, stk. 3 verða orðini: "Landsstýrismaðurin ger reglur eftir 1. og 2. stk." broytt til: "Landsstýrismaðurin ger reglur eftir stk. 1 og 2."

74. Í kapittli 7 verður yvirskriftin: "Yvirleiðsla og yvirumsjón" broytt til: "Meginfyrisitingin og yvirumsjónin".

75. Í § 57, stk. 1 verða orðini: "Landsstýrismaðurin hevur ta yvirskipaðu leiðsluna og yvirumsjónina av fólkaskúlanum" broytt til: "Landsstýrismaðurin hevur meginfyrisitingina og yvirumsjónina av fólkaskúlanum.".

76. Í § 59 verða orðini: "eftir at avgerðin er fráboðað, smb. tó § 57, 9. stk." broytt til: " eftir at avgerðin er fráboðað, smb. tó § 57, stk. 9."

77. Í § 66 verða orðini: "undirvísa næmingar í fólkaskúlaaldri, smb. eisini § 4, 4. stk." broytt til: "undirvísa næmingar í fólkaskúlaaldri, smb. eisini § 4, stk. 4."

78. Í § 67, stk. 1 verða orðini: "Lógin fær gildi 1.

august 1998, smb. tó 2. - 4., 7. og 8. stk." og "um undirvísing úr gildi, smb. tó 5. og 6. stk." broytt til: "Lógin fær gildi 1. august 1998, smb. tó stk. 2 — 4, 7 ug 8." og "um undirvísing úr gildi, smb. tó stk. 5 og 6."

79. Í § 67, stk. 2 verða orðini: "5. kapittli", broytt til: "kapittul 5",
80. Í § 67, stk. 3 verða orðini: "Ásetingin í § 5, 2. stk., 2. pkt. viðvíkjandi" broytt til: "Ásetingin í § 5, stk. 2, nr. 2 viðvíkjandi"
81. Í § 67, stk. 4 verða orðini: "Ásetingin í § 14, 5. stk. um verkætlanaruppgávuna" broytt til: "Ásetingin í § 14, stk. 5 um verkætlanaruppgávuna"
82. Í § 67 verður sett inn sum nýtt stk. 6:
"Stk. 6. Teir í § 31, stk. 2 nevndu sáttmálar eru fyribils í gildi til 1. januar 2001, og skulu tá nýggir sáttmálar samstundis verða settir í gildi". Samstundis verða stk. 6, 7 og 8 broytt til ávikavist stk. 7, 8 og 9.

§ 2.

Henda løgtingslóg fær gildi 1. august 1998.

Almennar viðmerkingar

Tað er greitt, at ávísir skeivleikar eru komnir fyri í løgtingslóg nr. 125 frá 20. juni 1997, soleiðis sum hon er lýst at koma í gildi.

Av tí at øll tøl á greinum og stykkjum í lógini eru sett aftan fyri beitini § og stk., verður skotið upp, at rætta hetta í lógini, so at samsvar verður millum talsetanina á greinum og stykkjum um alla lógina. Tað verður tí skotið upp, at nevndu fyribrigdi verða broytt í allari lógini, so at samsvar verður hesum viðvíkjandi.

Tað er eyðsæð, at ávísir skeivleikar eru komnir fyri í kapittli 6 í lógini, sum mugu verða rættaðir. Annars verður eisini víst á, at serligir trupulleikar kunnu fara at standast av samansetingini í skúlastýrunum, av tí at tær hugsjónarligu intentiónir, sum upprunaliga vóru í mannum millum uppgávurnar hjá by-/bygdarráð og skúlanevnd skúlanum viðvíkjandi, at tær nu als ikki siggjast aftur í lógini, soleiðis sum skúlastýrini nú eru mannað. Upprunaliga ætlanin við skúlastýrinum er at geva foreldrunum møguleika til at ávirka dagliga virki, meðan uppgáva kommunustýrisins er at tryggja teir ytru karmarnar til tess at kunna fremja undirvísingina. Hetta tvíbýtið er nú avlagað í lógina. Tí verður skotið upp, at broyta lógina soleiðis, at tað verður samsvar millum ætlanina við skúlastyrunum og veruleikan. Víst verður til viðmerkingarnar til uppskotið um broytingar í nevnda kapittli í teimum ávísu lógargreinunum.

Tað má sigast at verða sera óheppið og skeivt at seta í lógina, at eftirmeting skal verða gjørd av úrtøku næminganna við endan á 7. skúlaári, samstundis sum undirvísingarskyldan er longd til 9 ár. Tá ið undirvísingarskyldan er lokin, verður fráfaringarroynd skipað. Harumfrant skal úrtøka næminganna javnan verða eftirmett (samanber § 14). Víst verður til viðmerkingarnar til uppskotið um at strika § 16, stk. 1 í lógini. Tað verður tí skotið upp at strika § 16, stk. 1 í lógini.

Sum heild kann verða sagt, at tær broytingar, sum her verður skotið upp at gera í umanfyri nevndu løgtingslóg um fólkaskúlan, eru í samsvari við tey sjónarmið, sum eru grundarlag undir lógini sum heild, og tær fáa ongar fíggjarligar avleiðingar fyri landskassan.

Viðmerkingar til tær ymisku lógargreinirnar

Ad. § 1: 1), 2), 3), 4), 5), 6), 7), 8), 9), 10) og 11). Talan er um tekniskar og málsligar tillagingar, sum ikki broyta innihaldið í ásetingunum.

Ad. 12: Skotið verður upp, at § 16, stk. 1 verður strikað úr lógini.

Fólkaskúlalógin ásetur, at úrtøka næminganna skal javnan verða eftirmett (samanber § 14).

Grundgevingarnar í álitinum til lógina eru m.a. hesar: *"Tílík eftirmeting hevur til endamáls at upplýsa lesarar, næmingar og foreldur um, hvørt undirvísingarárslátið samsvarar við tað, mikið var eftir, og hvussu*

tann komandi undirvísing skal verða ráðlegd og framd í verki. Tað er við støði í hesari eftirmeting, at hvør einstakur næmingur kann verða leiðbeindur. Tílík eftirmeting, ið samsvarar tørvin hjá hvørjum einstøkum næmingi, er neyðug til tess at fyriveika og fremja eina nóg góða næmingalagaða undirvísing, kann t.d. verða gjørd við royndum, spurnarblaðum, eygleiðingum, samrøðum o.a."

Nýggja grein 3 í lógini sigur: "*Innan fyri settar karmar hevur tann einstaki skúlin ábyrgdina av undirvísingarárangrinum ...*"

Undirvísingarskyldan er longd, so at hon nú er 9 ár ístaðin fyri 7 ár, og samsvarandi hesum er ásett í § 4, at: "*Fólkaskúlin er ein 9 ára grundskúli og ein 1 árs 10. flokkur.*"

Í løgtingslógaruppskotinum sigur meirilutin í løgtingsins mentanarnevnd: "*Meirilutin er ikki saunførdur um, at gamla 13-ársroyndin var tann besta, og metir tí til, at eftirmetingin verður lagað til broytta undirvísingar møguleikarnar í fólkaskúlanum. Meirilutin er av teirri fatan, at gagnið skúlaverkið fær av, at kanduleikastøðið verður staðfest við endan á grunddeildini, verður fólkaskúlanum at fremja.*"

Verður henda grundgeving tikin bókstavliga, so hevur skúlin, sum nú er, fráfaringarroynd, tá ið **grundskúlin,** t. e. tá ið **9 ára undirvísingarskyldan** endar. Andin í lógini viðvíkjandi fráfaringarroyndunum er tann, at tað er næmingurin, sum í samráð við foreldrini og skúlan tekur avgerð um, hvørt hann skrivar seg inn til hesar royndir ella ikki. Hetta hevur staðið næmingunum í boði síðani 1979.

Tá ið skúlin í sínum tíð hevði sokallaðu 13-ársroyndina, var tað við tí endamáli, at tá ið 7 ára skúlagongdin var liðug, hevði næmingurin ikki longur skyldu at ganga í skúla. Fyri at kanna, hvat stoðið næmingarnir vóru á eftir lokna skúlagongd, skipaðu myndugleikarnir fyri eini og somu roynd fyri øllum hesum næmingunum í skrivligum føroyskum, donskum og skrivligari rokning.

Hetta kundi hava sína meining tá, av tí at 7 ára kravda skúlagongdin tá var liðug. Men meiningin við hesum fall burtur, tá ið flest allir næmingarnir sjálvkravdir ynskti at halda fram við skúlagongdini í 8., 9. og 10. flokki.

At halda eina roynd , tá ið næmingarnir hava gingið 7 ár í skúla, er ikki í samsvari við tær námsfrøðiligu hugsanirnar í galdandi fólkaskúlalóg, og í skúlahøpi er tí eitt gamalt býtisbarn, sum er komið inn í lógina, uttan at grundgeving er fyri, hví so skal vera. Hví skal royndin vera, tá ið næmingarnir bert hava gingið 7 ár í skúla? Teir kunnu ikki fara úr skúlanum, fyrr enn 9 ára undirvísingarskylda teirra er endað, og tá verður skipað fyri fráfaringarroynd, men við tí námsliga aðalsjónarmiði, at tað er næmingurin, sum saman við foreldrunum ger av, um hann skrivar seg inn til royndina.

Henda fráfaringarroynd fólkaskúlans hevur til endamáls at geva næmingunum møguleika at lýsa eina kannaða meting um, í hvørjum vavi teir hava nomið sær kunnleika, fimi, arbeiðshættir og málbering, ið sett er sum mál fyri undirvísingini.

Ad. § 1: 13), 14), 15), 16), 17), 18), 19), 20), 21) og 22). Talan er um tekniskar og málsligar tillagingar, sum ikki broyta innihaldið í ásetingunum.

Ad. § 1: 23) Í kapittul 3 verður yvirskriftin: "Skipanin av skúlaverkinum" broytt til: "Skipanin"

Orsøkin til hesa broyting er tann, at hugtakið skúlaverk fevnir vanliga um allar skúlar í undirvísingarskipanini og ikki bert um fólkaskúlan, sum meiningin er í hesum lørinum.

Ad. § 1: 24), 25), 26), 27), 28), 29), 30), 31), 32) og 33). Talan er um tekniskar og málsligar tillagingar, sum ikki broyta innihaldið í ásetingunum.

Ad. §1: 34).

Við heimild í § 31, stk. 2 í fyrrverandi fólkaskúlalógum og galdandi fólkaskúlalóg hava tveir ella fleiri skúlamyndugleikar á staðnum kunnað gingið saman í eitt skúlasamband til heilt ella lutvíst at skipa sína skúlaviðurskifti felags í øki skúlamyndugleikanna.

Samsvarandi hesum hava fleiri skúlasambond verið skipað ymsastaðni í landinum, bæði serliga hevur verið miðað eftir, at so at siga allir teir næmingar, ið áhuga hava havt fyri tí, hava kunnað farið upp til preliminer-/realprógvtøku og nú fráfaringarroyndir fólkaskúlans og kortini verið búgvandi heima. Í nøkrum førum fevna tílík skúlasambond eisini um næmingarnar í teimum yngru flokkum fólkaskúlans.

Felags fyri mestsum øll hesi skúlasambond er, at tey eru sett á stovn, uttan at nakar skrivligur sáttmáli tykist at hava verið gjørdur, soleiðis sum bæði fyrrverandi fólkaskúlalógir og verandi og komandi fólkaskúlalóg allar hava ásett.

Orsøkin til tess er m.a. helst tann, at tá á døgum var so umráðandi at fáa sum mest av næmingum til tær nýggju framhaldsdeildirnar, sum komu um tað mundið, og tí vóru allir næmingar "uttanífrá" sera væl komnir, og lítið og einki var hugsað um tann formliga partin, t.e. skrivligar sáttmálar, tá ið næmingar fóru yvir um kommunumarkið at ganga í skúla.

Tað var tí ikki, fyrr enn vit fingu tveir av teimum síðstu felagsskúlunum, Sandoyar Meginskúla og Felagsskúlan á Oyrarbakka, at sáttmálar vórðu gjørdir, so sum 62-lógin eisini ásetti.

Tað má ásannast, at komandi fólkaskúlalóg, sum í § 31, stk. 2 eisini staðfestir, at ein sáttmáli skal verða gjørdur, tá ið tveir ella fleiri skúlamyndugleikar á staðnum ganga saman í eitt skúlasamband, ongar ásetingar eru í kapittli 6 um fyrisitingina av einum tílíkum skúlasambandi. Harafturímóti eru nágreiniligar ásetingar í komandi lóg um lut kommunustýrisins og skúlastýrisins í sambandi við tann einstaka fólkaskúlan í kommununi.

Samsvarandi hesum verður mælt til, at § 31, stk. 2 verður broytt, so heitini felagskommunustýri og felagsskúlastýri koma við í lógina í sambandi við kommunur, sum ganga saman í eitt skúlasamband.

Sambært § 67, stk. 7 fáa ásetingarnar í §§ 46-56 um fyrisitingina ikki gildi fyrr enn 1. januar 2001, og ert tá áður nevndu tveir sáttmálar viðvíkjandi Sandoyar Meginskúla og Felagsskúlanum á Oyrarbakkanum longu farnir úr gildi, um teir ikki verða longdir til ta tíð, so sum eisini heimild er til sambært § 13 í báðum sáttmálum.

Av hesum ávum er tí hildið skilabest at áseta í lógina:

a) skiftisreglur, ið gera greitt, at allir sáttmálar viðvíkjandi skúlasambondum eru framhaldandi í gildi til 1. januar 2001, og
b) fyrisitingarligar reglur, ið eisini fevna um skúlasambond og ikki bert um kommununnar skúlaverk, so sum gjørt er í kapittli 6.

Ad. § 1: 35), 36), 37), 38), 39), 40), 41), 42), 43), 44), 45), 46), 47), 48), 49), 50) og 51). Talan er um tekniskar og málsligar tillagingar, sum ikki broyta innihaldið í ásetingunum.

Ad. § 1: 52). Í kapittli 6 verður yvirskriftin "Fyrisitingin av skúlaverkinum" broytt til: "Fyrisittingin"

Sama grundgeving sum til kapittul 3. Nevnast kann í hesum sambandi, at fyrisitingin av skúlaverkinum t.d. í Klaksvík skuldi sostatt fevnt um allar skúlar í Klaksvík, og tað er ikki talan um her. Ásetingarnar eru bert galdandi fyri fólkaskúlarnar.

Ad. § 1: 53). Í hesi lógargrein er staðfest, at skúlamyndugleikin á staðnum er kommunustýrið og skúlastýrið. Men meðan kommunustýrið er myndugleiki hjá fólkaskúlunum í kommununi, so er myndugleiki skúlastýrisins avmarkaður til tann einstaka skúlan.

Ad. § 1: 54), 55), 56) og 57. Talan er um tekniskar og málsligar tillagingar, sum ikki broyta innihaldið í ásetingunum.

Ad. § 1: 58). Skotið verður upp, at orðini: "fyrisitingina av kommununnar skúlaverki" verður broytt til: "fyrisitingina av skúlanum/skúlunum í kommununi". Orsøkin til hesa broyting er tann, at hugtakið "skúlaverk" fevnir um allar skúlar í undirvisingarverkinum og ikki bert um fólkaskúlan

Ad. § 1: 59). Talan er um tekniskar og málsligar tillagingar, sum ikki broyta innihaldið í ásetingunum.

Ad. § 1: 60). Hetta er nytt nr. 5. Starvsskipanin, sum skal standa í reglugerðini, eigur at fevna um: formansval, atkvøðugreiðslu, varamenn, um fundirnir eru almennir ella ikki, fundarboð, fundarskrá o.a. Tí verður mælt til, at hetta verður eitt av punktunum í reglugerðini.

Ad. § 1: 61 og 62). § 49 í lógini verður strikað. Ístaðin verður nýtt innihald sett í § 50. Hetta er sama innihald, sum stóð í § 50 í álitinum frá Ráðleggingarnevndini viðvíkjandi skúlastyrunum. Tískil eru viðmerkingarnar tær somu sum í álitinum. Orsøkin til, at mælt verður til at seta inn aftur somu orðing, sum stendur í álitinum frá Ráðleggingarnevndini, er tann, at har er "vantært" skot millum uppgávurnar hjá skúlastýrinum og kommunustýrinum, eins og tað er í verandi lóg. Tað er tí hildið at vera sera óheppið, um kommunalpolitikarar skulu sita í einum skúlastýri, sum er skipað við tí í huga, at tað skulu vera foreldur og skúli, sum í felag skulu taka tær avgerðir viðvíkjandi skúlanum, sum tey át frá einum námsfrøðiligum sjónarmiði halda gagna bæði skúla og børnum best.

Stk. 1: Sambært galdandi skúlalóggávu eiga skúlanevndir at vera í hvørji einstakari kommunu. Tær eru sum kunnugt fólkavaldar. Sjálvt um tað eru fleiri skúlar í eini kommunu, so er kortini bert tann eina skúlanevndin/-ráðið, sum hevur um hendi allan tann myndugleika og tær heimildir, hesi/tí er tillutað eftir lógini.

Mælt verður nú til, at skúlanevndin/ ráðið í verandi líki verða avtikin, og at eitt skúlastýri ístaðin verður skipað fyri hvønn einstakan skúla, sum í minsta lagi hevur 20 næmingar og 2 lærarar.

Sambært yvirlitinum,"Ráðlegging Fólkaskúlans", sum Landsskúlatænastan hevur givið út á hvørjum ári, eru tað

1) um leið 40 fólkaskúlar, ið hava meir enn 20 næmingar og fleiri lærarar og
2) um leið 20 skúlar, ið hava minni enn 20 næmingar og bert 1 lærara til vanliga undirvísing.

Hildið verður hóskandi at bruka hetta markið sum meginreglu á tann hátt, at til hesar báðar skúlastøddirnar verða vald skúlastýri við ymiskum limatali.

Stk. 2: Skotið verður upp, at limirnir í hesum skúlastýrinum skulu vera: 5 ella 7 foreldraumboð, 2 umboð fyri lærararnar og hini samstarvsfólkini og 2 næmingaumboð, sí stk. 3.

Neyðugt verður at gera gjøllari reglur m.a. um val av foreldraumboðum í skúlastýrið, smb. § 51, stk. 1.

Samstarvsfólk eru øll tey, sum arbeiða í skúlanum, smb. §§ 35 og 36, og sum fyriskipanarheimild skúlaleiðaransins fevnir um. Skúlatænari og reingerðarfólk, ið kanska eru sáttmálasett, og fólk sum t.d. skúlalækni, skúlatannlækni og sálarfrøðingur, ið bert eru av og á í skúlanum, og sum starvast undir øðrum setanarmyndugleika, eiga ikki at vera mett sum samstarvsfólk skúlans.

Um so er, at varaskúlastjórin er valdur sum umboð fyri samstarvsfólkini, so kann hann ikki samstundis vera varamaður skúlaleiðarans sum skrivari hjá skúlastýrinum.

Nevndin er av teirri áskoðan, at samstarvsfólk eigur í minsta lagi at hava starvast 1 ár í skúlanum fyri at hava valrætt og kunna verða valt. Grundgevingin fyri hesum er tann, at valskeiðið hjá tílíkum umboðum er bert 1 ár, smb. 8. stk.

Tað er í prinsippinum einki sett aldursmark fyri, hvussu ungir næmingarnir skulu vera, fyri at teir kunnu vera valbærir og hava atkvøðurætt til skúlastýrið. Um so er, at skúli hevur næmingaráð, so er tað hetta ráð, ið velur tey 2 næmingaumboðini í stýrið. Er einki næmingaráð, taka allir næmingurnir lut í valinum. Viðvíkjandi valreglum o.a., sí § 51, stk. 1.

Her eru so skotin upp tey umboð, ið skulu vera á fundi í skúlastýrinum. Av hesum uppskoti sæst t.d., at varaskúlastjórin kann ikki vera á skúlastýrisfundi saman við skúlaleiðaranum. Kommunustýrinum er t.d. heldur ikki heimilað at tilnevna fastan eygleiðara. Skúlastýrið kann haraftrimóti altíð bjóða áhugaðum, herímillum t.d. varaskúlastjóranum, øðrum foreldraumboðum o.s.fr. at koma til fundar um tey mál á dagsskránni, ið hava teirra serstaka áhuga.

Stk. 3: Av tí at royndir aðrastaðni syna, at tað kann vera torført at fáa næmingar í 11-12 ára aldri at vera á tílíkum fundum, so heldur nevndin tað vera hóskandi at seta hesa avmarking í lógina.

Stk. 4: Mælt verður til, at smærru skúlarnir eisini fáa skúlastýri samsvarandi tí leisti, sum gjørdur er fyri teir stóru skúlarnar. Hetta kann verða tørført í teimum heilt smáu skúlunum, har tað kanska eru somu foreldur, ið eitsamøll eiga næmingunum. Men bildið verður tó, at hetta ber til, um foreldraumboðini verða 2 ella 3, og hæði foreldrini eru limir í skúlastýrinum. Í hesum skúlastýri fær lærarin, sum eitsini er skúlaleiðari, atkvøðurætt.

Stk. 5: Tað er týdningarmikið fyri menningina av kommununnar skúlaskapi, at gott samstarv er ímillum kommunustýrið og skúlastýrið. Við støðugum innliti í málsviðgerðir skúlastýrisins verður kommunustýrið betur ført fyri at fylgja við virksemi skúlans og at dugna skúlans arbeiði sum best. Samsvarandi hesum verður mælt til, at kommunustýrið kann eftir ábeitan frá skúlastýrinum gera av, at ein av limum tess er við á skúlastýrisfundi uttan atkvøðurætt.

Stk. 6: Av tí at tað bert eru næmingaumboðini og skúlaleiðarin, ið ikki hava atkvøðurætt, so verður bildið best hóskandi at tilskila hetta heldur enn at reksa tey upp, sum hava atkvøðurætt.

Stk. 7: Formaðurin í skúlastýrinum skal verða valdur ímillum foreldraumboðini. Ásetingar um formansval, herímillum um formansvalið t.d. skal vera galdandi fyri 1 ár ella alt valskeiðið, skal standa í reglugerðini hjá skúlastýrinum ella í fundarskipan stýrisins. Í fundarskipanini eiga at vera reglur um fundarfráboðan, dagsskrá, viðtøkuføri, atkvøðuform, varalimir o.s.fr.

Fundirnir í skúlastýrinum eiga ikki at vera almennir, og tann einstaki stýrislimurin eigur tí heldur ikki at endurgeva, hvat ið hinir limirnir hava sagt á fundinum. Hetta er galdandi, sjálvt um upplýsingin ikki kemur undir tagnarskylduna. Haraftur-ímóti er stýrislimi loyvt at siga sína hugsan og støðutakan, uttan so er, at málið snýr seg um upplýsingar í trúnaði. Tagnarskyldan er eisini galdandi fyri næmingaumboðið.

Skúlastýrisformaðurin tekur støðu til margfaldan, sending og møguliga almannakunngerð av dagsskránni og stýrissamtyktum samsvarandi møguligum ásetingum í fundarskipanini hesum viðvíkjandi. Hildið verður, at almenningurin altíð eigur at hava atgongd til samtyktargerðabók stýrisins.

Stk. 8: Skúlaleiðarin, ið er við á stýrisfundi uttan atkvøðurætt, er skrivari í stýrinum. Ikki er loyvt leiðara skúlans at hava varaskúlastjóran ella annað hjálparfólk við á fund sum skrivara. Haraftrímóti skal varaskúlastjórin umboða leiðara skúlans, tá ið honum berst frá.

Stk. 9: Av tm.a. teirri orsøk, at nógvir næmingar flyta úr sínum egna skúla eftir 7. skúlaár og fara í annan skúla at ganga í framhaldsdeild í 3 ár, so verður hildið hóskiligast at lata valskeiðið hjá foreldraumboðunum eisini vera 3 ár. Neyðugt verður at gera gjølluri reglur um val o.a., smb. § 51, stk.1.

Mælt verður til, at tey fólk, sum starvast í skúlanum, kunnu ikki vera foreldravaldir limir í skúlastýrinum; men tey hava tó valrætt. Foreldraumboð, sum verður sett í starv í skúlanum í valskeiðinum, skal fara úr skúlastýrinum. Henda ásetting talar ikki um skúlalæknan, heilsusjúkrasystrina o.o., sum ikki eru undir leiðslu skúlans í sambandi við tænastuna. Viðvíkjandi spurningtinum um, hvørt ávís foreldraumboð ikki kunnu verða vald í skúlastýrið vegna ógegni, verður vist á vanligar umsitingarligar meginreglur hesum viðvíkjandi.

Stk. 10: Næmingaumboðið skal ongantíð verða við at viðgera einstaklingsmál, hvørki tá ið tað snýr seg um næmingar, lærarar ella onnur samstarvsfólk.

Stk. 11: Í summum kommunum fer undirvísing skúlans fram í skúlaeindum, sum hølisliga eru spjaddar í skúlaøkinum. Hugsað verður um t.d. Tvøroyrar kommunu, har undirvíst verður bæði á Tvøroyri og í Trongisvági, og Runavíkar kommunu, har undirvíst verður í 4 ymiskum skúlaeindum. Í Tórshavn er t.d. eisini Ytri Skúli og Heimari Skúli partur av Venjingarskúlanum.

Tað má vera bæði rætt og rímiligt, at foreldur, sum eiga skúlabørn í hesum skúlaeindum, skulu hava rætt at velja í minsta lagi 1 foreldraumboð fyri hvørja skúlaeind. Foreldraumboð skúlaeindarinnar skal verða valt av teimum og ímillum teirra, ið hava foreldramyndugleikan yvir teimum børnum, sum ganga í skúla í viðkomandi skúlaeind. Mælt verður til, at tær í § 50, stk. 1 nevndu valreglur, sum landsstýrismaðurin ásetur, eisini skulu fata um ásetingarnar í hesum petti.

Ad. § 1: 63). Talan er um tekniskar og málsligar tillagingar, sum ikki broyta innihaldið í ásetingunum.

Ad. § 1: 64). Stk. 3. Orðingin er nýggj, og ásetingarnar í hesum stykkinum eru nú soleiðis, at tær eru í samsvari við nýggju § 31 um felagsskúlastýri. Heimildirnar hjá landsstýrismanninum at kunna økja foreldraumboðanina í skúlastýrunum er við teirri ásamman, at tað í nøvnd og veru er stórur munur á skúlastøddunum, sum tey einstøku skúlastýrini fevna um. Tað verða nøkur skúlastýri, ið fara at vera av einum ella nøkrum heilt fáum næmingum, meðan tað verða onnur, ið fara at vera av 400-500 næmingum, umframt tað, at tær kommunur, sum eru gingnar saman um skúlasamstarv, eisini hava tørv á, at foreldraumboðini í skúlastýrunum vera av næmingunum í flest øllum bygdunum, sum eru í skúlasambandinum. Her verður serliga hugsað um Felagsskúlan á Oyrarbakka og Sandoyar Meginskúla.

Ad. § 1: 65), 66), 67), 68), 69) og 70). Talan er um tekniskar og málsligar tillagingar, sum ikki broyta innihaldið í ásetingunum.

Ad. § 1: 71). Hildið verður, at orðingin í stk. 2 "mótvegis skúlamyndugleikunum á staðnum" er ikki hepnisliga vald, og tí verður mælt til at seta hesa orðing inn ístaðin: "Undir ábyrgd skúlamyndugleikunna hevur skúlaleiðarin ta fyrisitingarligu og námsfrøðiligu leiðsluna av skúlanum og ábyrgdina av virksemi skúlans."

Ad. § 1: 72) og 73). Talan er um tekniskar og málsligar tillagingar, sum ikki broyta innihaldið í ásetingunum.

Ad. § 1: 74). Í kapittli 7 verður yvirskriftin **"Yvirleiðsla og yvirumsjón"** broytt til: **"Meginfyrisitingin og yvirumsjónin".**

Hildið verður, at orðingin "yvirskipaðu leiðsluna" er ikki hepnisliga vald, og at hon tískil kann verða misfatað.

Við tí í huga, at bæði tann meginfyrisitingarligi og yvirumsjónarligi parturin, sum Landsskúlaráðið fyrisiting vóru sett at røkja landsstýrisins vegna sambært skúlafyrisitingarlógini, nú lutvísi er fluttur í kapitul 7, so verður mælt til samsvarandi hesum at broyta heitini til Meginfyrisitingin og yvirumsjónin.

Hildið verður eisini, at hesi nýggju heiti samsvara betur við tær uppgávur og heimildir, landsstýrismanninum eru tillutaðar í nýggju fólkaskálalógini.

Ad. § 1: 75), 76), 77), 78), 79), 80) og 81). Talan er um tekniskar og málsligar tillagingar, sum ikki broyta innihaldið í ásetingunum.

Ad. § 1. 82). Í hesum nýggja pettinum eru gjørdar skiftisreglur, ið staðfesta,

a) at hóast umrøddu tveir sáttmálar annars bert eru bindandi til ávikavist 31. juli 1999 og 31. juli 1998, so eru teir tó galdandi til 1. januar 2001 og

b) at nýggir sáttmálar, sum eru í samsvari við tann fyrisitingarligu táttin um skúlasambond í teirri nýggju lógini, tá samstundis skulu koma í gildi í staðin fyri verandi sáttmálar.

Ad. § 2. Skotið verður upp, at henda løgtingslóg fær gildi 1. august 1998.

1. viðgerð hósdagin 12. mars 1998. Uppskotið varð heint í mentanarnevndina.

Málið fall burtur sbr. stýrisskipanarlógini § 15 stk. 3, tí at løgtingsval var 30. apríl 1998, og málið ikki var liðugt viðgjørt á tingi fyri valið.

F.L.j.nr. 2101-77/97

107 Uppskot til løgtingslóg um yrkisútbúgvingar

Ár 1998, hósdagin 5. mars, legði Eilif Samuelsen, landsstýrismaður, vegna landsstýrið fram soljóðandi

U p p s k o t
til
løgtingslóg um yrkisútbúgvingar

Kapittul 1
Endamál o.a.

§ 1. Landsstýrismanninum verður heimilað at skipa fyri yrkisútbúgvingum umframt arbeiðsmarknaðarútbúgvingum.

§ 2. Útbúgvingarnar skulu miða ímóti:

1) at menna tann einstaka og hjálpa viðkomandi til samfelagsliga fatan

2) at leggja grundarlag undir framtíðar yrki og framhaldandi útbúgving

3) at nøkta tørvin hjá vinnuni, tá ið um ræður faktigan førleika og almennan kunnleika

§ 3. Yrkisútbúgvingarnar verða skipaðar soleiðis, at skift verður millum verkliga lærutíð á lærupláss og undirvísing í skúla, og at tær enda við útbúgvingarskjali.

§ 4. Landsstýrismaðurin ásetur reglur um útbúgvingarnar sum heild og fyri hvørja útbúgving sær.

Stk. 2. Sambært §§ 19-20 verður sett eitt yrkisútbúgvingarráð, ið skal gera tilmæli um tær í stk. 1 nevndu reglur sambært heimildum í § 21.

Stk. 3. Sambært § 22 verða settar yrkisnevndir, ið skulu gera reglur fyri hvørja útbúgving sær sambært heimildunum í § 23.

§ 5. Landsstýrismaðurin setur á stovn, leggur niður og tekur av yrkisútbúgvingar eftir tilmæli frá yrkisútbúgvingarráðunum.

Stk. 2. Landsstýrismaðurin ásetur reglur um upptøku í skúla, fluksbýtistal og skúlasamstarv eftir tilmæli

frá yrkisútbúgvingarráðnum.
Stk. 3. Skúlagongdin fer fram í góðkendum skúla.
Stk. 4. Landsstýrismaðurin ásetur eftir tilmæli frá yrkisútbúgvingarráðnum og eftir samtykt í viðkomandi yrkisnevnd, jbr. § 22, nærri reglur um skúlagongd og sveinaroynd fyri teir lærlingar, ið ikki kunnu fáa skúlagongdina í Føroyum.

Kapittul 2
Atgongd til útbúgvingarnar

§ 6. Tann, sum verður tikin í læru í einari yrkisútbúgving, skal hava fylgt undirvísingini til fráfaringarroynd fólkaskúlans og hava góðkendan lærusáttmála.
Stk. 2. Landsstýrismaðurin ásetur, eftir tilmæli frá yrkisútbúgvingarráðnum, um eitt útbúgving verður roknað sum yrkisútbúgving og kemur undir sáttmálaskyldu.

§ 7. Skúlin hevur í teimum yrkisútbúgvingum, hann bjóðar seg fram í, skyldu at taka allar lærlingar, sum lúka treytirnar sambært § 6, stk. 1, inn í skúla.
Stk. 2. Landsstýrismaðurin kann áseta, eftir tilmæli frá yrkisútbúgvingarráðnum, at partur av verkligu læruni fer fram í skúla, og at partur av skúlaundirvísingini fer fram á læruplássi.

Kapittul 3
Útbúgvingarskipanin

§ 8. Fyri lærlingar, sum byrja eina yrkisútbúgving við lærusáttmála, verður lærutíðin roknað frá tí degi, sáttmálin hevur gildi.
Stk. 2. Hevur lærlingur, áðrenn læran byrjar, tikið støðisútbúgving á yrkisskúla, kann skúlagongdin góðskrivast og lærutíðin styttast.
Stk. 3. Viðkomandi yrkisnevnd samtykkir, um tann í stk. 2 nevnda støðisútbúgving kann góðskrivast.
Stk. 4. Viðkomandi yrkisnevnd samtykkir útbúgvingarreglur, herundir reglur um útbúgvingartíð, býtið millum verkliga læru og skúlagongd, sbr. § 3, val av lærugreinum sbr. § 14, stk. 1 eins og reglur um endamálið við verkligu læruni og skúlagongdini sbr. §§ 11 og 16, samanber § 23.
Stk. 5. Landsstýrismaðurin ásetur, eftir tilmæli frá yrkisútbúgvingarráðnum og eftir samtykt frá viðkomandi yrkisnevnd, tær í stk. 4 nevndu útbúgvingarreglur fyri hvørja útbúgving sær.

§ 9. Landsstýrismaðurin kann, eftir tilmæli frá yrkisútbúgvingarráðnum og eftir samtykt í viðkomandi yrkisnevnd, áseta reglur um, at lærlingur við aðrari útbúgving ella arbeiðsroyndum, kann sleppa undan partí av verkligu læruni ella skúlagongdini.
Stk. 2. Útbúgvingarskipanin skal bera í sær, at um lærlingur má gevast við útbúgving sini, so skal tað verða gjørligt at taka hana uppaftur seinni, smb. § 35.
Stk. 3. Eftir tilmæli frá yrkisútbúgvingarráðnum kann verða skipað fyri ískoytisskeiði til lærling, sum skiftir útbúgving, smb. § 27, stk. 2.
Stk. 4. Lærlingi kann verða veitt eykaundirvísing í tann mun, hetta er neyðugt, fyri at útbúgvingin kann verða lokin, smb. § 15, stk. 2.

§ 10. Landskassin veitir stuðul til tær beinleiðis undirvísingarútreiðslurnar frároknað inntøkur við skúlaundirvísingini eftir hesi lóg.
Stk. 2. Eftir tilmæli frá yrkisútbúgvingarráðnum kann landsstýrismaðurin áseta reglur um gjald fyri útreiðslur til undirvísingartiltar.
Stk. 3. Útreiðslurnar av sveinaroyndum verða býttar millum landskassan og yrkisfeløgini eftir reglum, sum landsstýrismaðurin ásetur eftir samráðing við yrkisfeløgini á arbeiðsmarknaðinum
Stk. 4. Í hesi lóg skal yrkisfelag skiljast sum meginfelag, um viðkomandi felag er limur í einum meginfelag.
Stk. 5. Skúlagongdin er ókeypis fyri lærlingar.

Kapittul 4
Innihaldið í yrkisútbúgvingunum

§ 11. Innihaldið í yrkisútbúgvingunum verður skipað samsvarandi endamálinum, sbr. § 2, og á tann hátt, at verkliga læran og skúlagongdin verða ein heild.
Stk. 2. Skúlaundirvísingin skal í byrjanini geva eina breiða heildarfatan. Seinni skal undirvísingin miða ímóti at veita lærlingunum neyðugan førleika í ávísum yrki. Undirvísingin skal verða so skipað, at hon nøktar skiftandi førleikakrøv frá vinnuni.

§ 12. Undirvísingin fatar um yrkislærugreinir, grundlærugreinir og vallærugreinir.
Stk. 2. Yrkislærugreinir skulu vanliga hava triggjar settapartar av samlaðu tíðini, grundlærugreinir tveir settapartar og vallærugreinir ein settapart.
Stk. 3. Grundlærugreinir kunnu í serligum føri verða havdar ístaðin fyri yrkislærugreinir.
Stk. 4. Yrkislærugreinir kunnu í serligum føri verða havdar ístaðin fyri vallærugreinir.

§ 13. Yrkislærugreinirnar fata um verkliga og ástøðiliga undirvísing, ið sermerkja viðkomandi útbúgving og skulu veita ulmennan kunnleika og fakligan

yrkisførleika. Partur av yrkislærugreinunum eru serlærugreinir, tó eru á hægsta fakliga stoði í útbúgvinginit og fata um verkliga og ástøðiliga undirvísing, tó skal miða ímóti at veita lærlinginum ein serligan yrkisførleika. Lærlingurin velur sergrein innan ta útbúgving, hann hevur gjørt lærusáttmála í.

Stk. 2. Grundlærugreinirnar fata um verkliga og ástøðiliga undirvísing, tó skal miða ímóti at menna tann fakliga kunnleikan. Somuleiðis skulu grundlærugreinirnar nøkta krøvini til ungdómsútbúgvingar, herímillum styrkja persónliga menning, lestrarførleika og samfelagsfatan.

Stk. 3. Vallærugreinirnar skulu miða ímóti at nøkta áhuganál lærlingsins, at stuðla áhugan fyri framhaldandi útbúgving og menna yrkis- og lestrarføleikan. Vallærugreinirnar skulu eisini stimbra vanligu førleikakrøvini og arbeiðsmøguleikarnar í samfelagnum.

§ 14. Landsstýrismaðurin ásetur, eftir tilmæli frá yrkisútbúgvingarráðnum og eftir samtykt frá viðkomandi yrkisnevnd, hvørjar yrkislærugreinir og grundlærugreinir skulu verða tengdar at tí ávísu útbúgvingini.

Stk. 2. Skúlarnir gera av, hvørjar vallærugreinir skulu verða bodnar út á skúlunum.

§ 15. Undirvísingin verður løgd til rættis við ynskjum lærlingsins í huga og lagað eftir fortreytum og áhuga hansara.

Stk. 2. Lærlingi, sum hevur lað fyri neyðini, kann verða givin serundirvísing og annar sernámsfrøðiligur stuðul.

Stk. 3. Lærlingi verður veitt ráð og vegleiðing viðvíkjandi útbúgvingini og persónligum viðurskiftum.

Stk. 4. Landsstýrismaðurin ásetur gjøllari reglur fyri tey í stk. 2 og 3 nevndu viðurskifti.

§ 16. Verkliga læran fer fram á einum ella fleiri virkjum, tó eru góðkend sum læruplass av viðkomandi yrkisnevnd, og hon er grundað á lærusáttmála millum lærling og viðkomandi virki.

Stk. 2. Landsstýrismaðurin ásetur, eftir tilmæli frá yrkisútbúgvingarráðnum og eftir samtykt frá viðkomandi yrkisnevnd, reglur um verkligu læruna í tann mun hesar reglur ikki eru ásettar í sáttmála millum viðkomandi yrkisfeløg.

§ 17. Lærlingurin fáa útbúgvingarskjal fyri fullførda útbúgving, heruppá váttan fyri framda skúlagongd og verkliga læru. Lærlingur, sum gevst í útbúgvingini, hevur rætt at fáa váttan fyri framd avrik.

Stk. 2. Prógtøkur verða skipaðar eftir reglum, sum landsstýrismaðurin ásetur. Prógtøkur í yrkislærugreinum og serlærugreinum verða tó ásettar eftir reglum, sum yrkisútbúgvingarráðið hevur tilmælt eftir samtykt frá viðkomandi yrkisnevndum.

§ 18. Sveina- og yrkisroyndir verða hildnar í teimum einstøku útbúgvingunum, um hetta er samtykt av viðkomandi yrkisnevnd. Sveinaroyndirnar verða fyriskipaðar eftir reglum, sum eru ásettar av landsstýrismanninum eftir tilmæli frá yrkisútbúgvingarráðnum og eftir samtykt frá yrkisnevndunum.

Stk. 2. Landsstýrismaðurin ásetur eftir tilmæli frá yrkisúthúgvingarráðnum reglur um dóming yvirhøvur og reglur um, hvussu útbúgvingarskjøl verða tilevnað og latin.

Kapittul 5
Ráðsskipanin

§ 19. Landsstýrismaðurin setur eitt yrkisútbúgvingarráð, sum í tilmælum sínum til landsstýrismannin viðger mál sambært teimum heimildum, tí eru givnar.

Stk. 2. Yrkisútbúgvingarráðið ger viðtøkur, sum landsstýrismaðurin góðkennir. Viðtøkurnar skulu greitt lýsa mannagongdina fyri ráðsarbeiðinum, herímillum um rikstrarstuðul landsstýrisins til ráðsskrivstovuna, tilnevning og val av ráðslimum og um atkvøðugreiðslur.

§ 20. Yrkisútbúgvingarráðið hevur 9 limir. Ráðslimirnir verða valdir fyri fyra ár. Fyri hvønn ráðslim verður ein varalimur valdur.

Stk. 2. Landsstýrismaðurin velur formannin.

Stk. 3. Landsstýrismaðurin tilnevnir 4 limir, sum skulu umboða arbeiðsgevarar. Hesir limir verða valdir soleiðis:

a) Føroya Handverksmeistarafelag velur 1 lim
b) Landsstýrismaðurin velur 1 lim
c) Føroya Arbeiðsgevarafelag velur 2 limir

Stk. 4. Landsstýrismaðurin tilnevnir 4 limir, sum skulu umboða løntakarar. Hesir limir verða valdir soleiðis:

a) Føroya Handverkarafelag velur 1 lim
b) Starvsmannafelagið velur 1 lim
c) Felagið S&K velur 1 lim
d) Føroya Arbeiðarafelag velur 1 lim

Stk. 5. Eitt umboð fyri hvønn góðkendan yrkisskúla kann møta á ráðsfundum. Hesi umboð hava talurætt, men ikki atkvøðurætt.

Stk. 6. Yrkisútbúgvingarráðið kann eftir tørvi innkalla serkøna hjálp til at møta á ráðsfundum.

Stk. 7. Landsstýrismaðurin veitir yrkisútbúgvingarráðnum skrivstovuhjálp og rindar útreiðslur ráðsins eftir gjøllari av landsstýrismanninum ásettum reglum, smb. § 19, stk. 2.

§ 21. Yrkisútbúgvingarráðið ger tilmæli til landsstýrismannin um:

a) reglur um útbúgvingar sum heild og hvørja útbúgving sær, smb. § 4, stk. 2.
b) stovnan, niðurlegging og avtøku av útbúgvingum, smb. § 5, stk. 1.
c) hvørjar útbúgvingar verða roknaðar sum yrkisútbúgvingar, smb. § 6, stk. 2.
d) verkligar partar í skúla og undirvísing á læruplásstum, smb. § 7, stk. 2.
e) útbúgvingarreglur, smb. § 8, stk. 5.
f) fritøku fyri partar av útbúgvingini, smb. § 9, stk. 1.
g) reglur um ískoytisskeið, smb. § 9, stk. 3.
h) reglur um gjald fyri undirvísingartilfar, smb. § 10, stk. 2.
i) hvørjar yrkis- og grundlærugreinir hoyra til ávísa útbúgving, smb. § 14, stk. 1.
j) reglur um verkligu læruna, smb. § 16, stk. 2.
k) reglur um prøvtøkur í yrkis- og serlærugreinum, smb. § 17, stk. 2.
l) reglur um sveina- og yrkisbrøvdir, smb. § 18, stk. 1.
m) reglur um døming o.a., smb. § 18, stk. 2.
n) reglur um hvussu lærlingur fær boð um at koma í skúla, smb. § 29, stk. 2.
o) reglur um burturvísing, smb. § 30, stk. 2.
p) hvussu lærusáttmálaskjal skal verða orðað, smb. § 31, stk. 2.
q) reglur um frávik, smb. § 44.
r) reglur um læraraførleika, smb. § 45.
s) skiftisreglur, smb. § 47, stk. 2.

Stk. 2. Yrkisútbúgvingarráðið hevur eisini til uppgávu:

a) at gera viðtøkur fyri ráðið, smb. § 19, stk. 2.
b) at tilnevna yrkisnevndir, smb. § 22, stk. 1.
c) at góðkenna viðtøku fyri arbeiðið hjá yrkisnevndum, smb. § 22, stk. 2.
d) at seta fyribilsnevndir, smb. § 22, stk. 3.
e) at áseta minstuløn til lærlingar, har ið eingin sáttmáli er, smb. § 33, stk. 3.
f) at ráðgeva landsstýrismanninum um, hvussu útbúgvingarskipanin eigur at leggjast soleiðis til rættis, at sett mál og krøv, smb. § 2, verða nádd
g) at fylgja við gongdini og nýggjum vinnumøguleikum, og við støði í hesum gera landsstýrismanninum tilmæli um tørvin á nýggjum útbúgvingum og umskipan av ella avtøku av verandi útbúgvingum
h) at fylgja við verandi útbúgvingum og við støði í hesum gera landsstýrismanninum tilmæli um tørvin á at samskipa útbúgvingarnar betur og møguliga leggja útbúgvingar saman.

Stk. 3. Yrkisútbúgvingarráðið kann av sínum eintingum umrøða og bera fram alt, ið ráðið og yrkisnevndirnar halda hava týdning fyri yrkisútbúgvingarnar, herundir útreiðslutørvin.

§ 22. Yrkisútbúgvingarráðið tilnevnir yrkisnevndir, sum skulu viðgera mál innan viðkomandi útbúgvingar við støði í teimum heimildum, sum givnar eru í hesi lóg.

Stk. 2. Limirnir í yrkisnevndunum verða valdir av viðkomandi yrkisfeløgum, sbr. § 10, stk. 4. Arbeiðsgevarar og lønmakarar skulu hava javnstóra umboðan.

Stk. 3. Yrkisnevndirnar skulu tilsamans fevna um allar útbúgvingar, ið eru settar í verk eftir hesi lóg. Tá ið útbúgvingar skulu fyrireikast og setast í verk, kann yrkisútbúgvingarráðið seta fyribilsnevndir.

Stk. 4. Kunnu feløgini ikki velja yrkisnevnd, skal yrkisútbúgvingarráðið siggja til, at yrkisnevnd verður sett.

Stk. 5. Yrkisnevndirnar skulu gera viðtøkur fyri nevndararbeiðið. Viðtøkurnar skulu greitt lýsa mannagongdina fyri nevndararbeiðinum, herímillum um tilnevning og val av nevndarlimum og um atkvøðugreiðslur.

Stk. 6. Yrkisútbúgvingarráðið skal góðkenna viðtøkurnar fyri tær í stk. 4 nevndu yrkisnevndir.

Stk. 7. Skrivstovuhjálp verður veitt yrkisnevndunum av viðkomandi yrkisfeløgum.

Stk. 8. Yrkisútbúgvingarráðið kann veita fyribilsnevndum, smb. stk. 3, skrivstovuhjálp.

§ 23. Fyri tær útbúgvingar, ið eru góðkendar, samtykkja yrkisnevndirnar reglur um:

a) hvørja útbúgving sær, smb. § 4, stk. 3.
b) útbúgvingartíðina, smb. § 8, stk. 4.
c) býtið millum verkliga læru og skúlagongd, smb. § 8, stk. 4.
d) stevnumiðini fyri verkligu læruna og skúlagongdina, smb. § 8, stk. 4.
e) valið av lærugreinum, smb. § 14, stk. 1.
f) góðkenning av læruplássum, smb. § 16, stk. 1.
g) verkligu læruna, smb. § 16, stk. 2.

h) prøvtøkur í yrkis- og serlærugreinum, smb. § 17, stk. 2.
i) sveina- og yrkisroyndir, smb. § 18, stk. 1.
j) stytting av útbúgvingartíðini, smb. § 35, stk. 2 og § 37
k) leinging av útbúgvingartíðini, smb. § 36, stk. 2 og 3.
l) stytting ella leinging av útbúgvingartíðini, smb. § 37.

Stk. 2. Landsstýrismaðurin ásetur reglurnar í samsvari við tað, ið yrkisnevndirnar hava ásett, tá ið reglurnar lógliga kunnu verða staðfestar.

Stk. 3. Yrkisnevndirnar hava eisini til uppgávu:

a) at samtykkja, um ein støðisútbúgving kann góðskrivast, og lærutíðin styttast samsvarandi, smb. § 8, stk. 3.
b) at gera leslætlanir fyri tær einstøku útbúgvingarnar, smb. § 24.
c) at virka fyri bestu viðurskiftum á læruplássum, smb. § 25, stk. 1.
d) at kanna lærupláss, smb. § 25, stk. 2.
e) at royna semju millum lærling og lærupláss, smb. § 40, stk. 1.

Stk. 4. Yrkisnevndirnar skulu eftir áheitan geva yrkisútbúgvingarráðnum ummælt í málum, ið hava týdning fyri arbeiðið hjá ráðnum.

Stk. 5. Yrkisnevndirnar kunnu av sínum eintingum umrøða og bera fram alt, ið tær halda hava týdning fyri yrkisútbúgvingarnar eftir hesi lóg.

§ 24. Skúli skal í samstarvi við yrkisnevndirnar gera leslætlanir, sum neyvt lýsa innihaldið í undirvísingini við støði í teimum reglum, ið sambært § 8, stk. 4 eru ásettar fyri hvørja útbúgving sær. Skúli og yrkisnevndir eiga eisini at fylgja við, um tørvur er á at endurnýggja nevndu reglur og koma við uppskoti um hetta.

Kapittul 6
Læruplássini

§ 25. Yrkisnevndirnar virka fyri, at útbúgvingarviðurskiftini á læruplássunum eru so góð sum gjørligt.

Stk. 2. Viðkomandi yrkisnevndir kunnu, uttan dómúrskurð og við neyðugum løgmæti, fara inn á virki, sum hava lærling, fyri at kanna útbúgvingarviðurskiftini.

§ 26. Samtykt yrkisnevndarinnar um góðkenning av virki sum lærupláss verður gjørd út frá meting um virkið er fært fyri at lúka lær treytir, sum settar eru sambært reglunum um verkligu lærumna, smb. § 16

Stk. 2. Kærur um samtyktir eftir stk. 1 kunnu verða lagdar fyri eina kærunevnd eftir gjøllari av lands stýrismannin ásettum reglum.

Kapittul 7
Sáttmálaviðurskifti

§ 27. Lærusáttmáli millum lærling og eitt ella fleiri lærupláss er treyt fyri at fullføra eina yrkisútbúgving. Lærusáttmálin skal fata um alla tá verkligu lærruna og skúlagongdina og um møguligu sveina- ella yrkisroynd.

Stk. 2. Um skeiðsreglurnar heimila tað, skal fiskoytisskeiðið, sambært § 9, stk. 3 verða partur av skúlagongdini eftir stk. 1.

§ 28. Er lærusáttmáli gjørdur við fleiri lærupláss, skal gjøllu tilskilast, hvørjum parti av útbúgvingini tað einstaka læruplássið hevur ábyrgdina av.

Stk. 2. Eitt lærupláss kann í lærusáttmálanum hava skyldu til at lata lærling taka ein verkligan part á øðrum læruplássi.

Stk. 3. Landsstýrismaðurin ásetur reglur um rættarstøðuna hjá lærlingi og læruplássi í sambandi við lærusáttmálar eftir stk. 1 og 2.

§ 29. Fyri at útbúgvingin skal verða fullførd, skal lærlingur fylgja undirvísingini, sum hon er fyriskipað av skúlunum sambært útbúgvingarreglunum.

Stk. 2. Landsstýrismaðurin ásetur eftir tilmæli frá yrkisútbúgvingarráðnum reglur um, hvussu mannagongdin skal vera, tá ið lærlingur fær boð um at koma í skúla.

Stk. 3. Landsstýrismaðurin kann ásetta reglur um bústaðarbús til lærlingar í sambandi við skúlagongd.

§ 30. Lærlingur, sum uttan tøgligt forfall heldur seg burtur frá undirvísingini, ella sum grovliga brýtur skúlans reglur, og sum ikki tekur givnar ávaringar til eftirtektar, kann verða útihýstur frá undirvísingini.

Stk. 2. Landsstýrismaðurin ásetur, eftir tilmæli frá yrkisútbúgvingarráðnum, gjøllari reglur um burturvísingina eftir stk. 1.

§ 31. Lærusáttmáli skal vera undirskrivaður, áðrenn læran byrjar.

Stk. 2. Lærusáttmálin er orðaður á skjal, sum landsstýrismaðurin góðkennir eftir tilmæli frá yrkisútbúgvingarráðnum.

Stk. 3. Landsstýrismaðurin ásetur gjøllari reglur um góðkenning, skriseting og avgreiðslu av lærusáttmálum.

§ 32. Tá ið lærlingur, sum er undir foreldramyndugleika, ger lærusáttmála, ella um sáttmálabroyting fer fram, krevur hetta játtan frá verjanum.

§ 33. Lønin, sum eitt læruplass skal rinda lærlingi, skal verða ásett í lærusáttmálanum.
Stk. 2. Lønin skal í minsta lagi verða tann, ið ásett er í sáttmála millum viðkomandi yrkisfeløg.
Stk. 3. Í yrkisgreinum, har eingin sáttmáli er galdandi, verður minstaløgin ásett av yrkisútbúgvingarráðnum.
Stk. 4. Landskassin endurrindar læruplássunum lærlingaløgnina, sum tó ikki kann verða hægri enn ásetta minstaløgin fyri handverkslærlingar sambært sáttmála millum Føroya Handverkarafelag og Føroya Handverksmeistarafelag, meðan lærlingurin fær ta til læruna hoyrandi skúlagongd.
Stk. 5. Landskassin rindar læruplásunum endurgjald fyri ferðaútreiðslur, sum standast av, at lærlingur er noyddur at fara til Danmarkar fyri at fáa ta til læruna hoyrandi skúlagongd, av tí at henda skútlaundirvísing ikki fæst í Føroyum.
Stk. 6. Landsstýrismaðurin ásetir nærri reglur um endurrindan eftir stk. 4 og 5.

§ 34. Í útbúgvingartíðini galda avtalur í arbeiðsmarknaðarsáttmála ella ásetingar í lóggávu.
Stk. 2. Eitt læruplass kann bert sum undantak áleggja lærlingi arbeiði, sum ikki hevur samband við útbúgvingina, og tá bert treytað av, at málið við útbúgvingini kann verða rokkið.

§ 35. Hevur lærlingur frammanundan lokið ein part av tí útbúgving, sum nevnd er í lærusáttmálanum, kann sáttmálin vanliga bert fata um vantandi partarnar av verkligu læruna og skúlagongdini, smb. § 8, stk. 2 og § 9. stk. 1.
Stk. 2. Fyri lærling, sum av aðrari útbúgving ella viðkomandi arbeiðsroyndum hevur serligar fortreytir at fara undir ta útbúgving, sáttmálin fatar um, kann viðkomandi yrkisnevnd samtykkja, at útbúgvingin kann verða stytt eftir teimum í § 8 ásettu reglum um útbúgvingartíð.

§ 36. Lærlingur og læruplass kunnu gera avtalu um at leingja útbúgvingartíðina, um lærlingurin,
a) vegna sjúku hevur verið burtur frá virkinum meir enn 10% av ásettu lærutíðini
b) er burtur frá virkinum vegna eykaundirvísing í skúla, smb. § 9, stk. 4.
c) hevur farloyvi í sambandi við barnsburð ella ættleiðing
d) hevur niðursetta arbeiðstíð ella farlovvi orsakað av serligum viðurskiftum

Stk. 2. Um avleiðingarnar av eini avtalu eftir stk. 1 verða tær, at útbúgvingartíðin verður longd meira enn ta tíð, sum lærlingurin hevur verið burtur, so er avtalan bert galdandi, um viðkomandi yrkisnevnd góðkennir avtaluna.
Stk. 3. Eru lærlingur og læruplass ikki samd um longda útbúgvingartíð vegna fráveru sum nevnt í 1. stk., kann viðkomandi yrkisnevnd, eftir áheitan frá pørtunum, áseta longda tíðarskeiðið.

§ 37. Í øðrum førum enn teimum, ið nevnd eru í §§ 35 og 36, kann viðkomandi yrkisnevnd, tá ið serlig viðurskifti tala fyri tí, samtykkja at stytta ella leingja útbúgvingartíðina.

§ 38. Partarnir kunnu ikki siga upp lærusáttmálan.
Stk. 2. Teir fyrstu 3 mánaðirnir í sáttmálatíðini verða tó roknaðir sum royndartíð, har annar parturin kann siga sáttmálan upp uttan grundgeving og uttan freist. Skúlagongd verður ikki roknað upp í royndartíðina.
Stk. 3. Um lærlingur av orsøk, sum nevnt í § 36, stk. 1, er burtur frá virkinum í meira enn 1 mánaða í royndartíðini, verður hon longd samsvarandi.

§ 39. Um annar parturin ikki heldur skyldur sínar, kann hin parturin siga lærusáttmálan upp.
Stk. 2. Um onkur týdningarmikil treyt fyrt at gera lærusáttmálan er skeiv ella seinni dettur burtur, kann hin parturin siga sáttmálan upp.
Stk. 3. Uppsøgn eftir stk. 1 ella 2 skal fara fram innan ein mánaði eftir, at uppsigandi parturin hevur fingið kunnleika um viðurskiftini ella eftir vanligum sketni skuldi havt fingið kunnleika til viðurskiftini, sum uppsøgnin er grundað á.
Stk. 4. Eykaundirvísingin sbr. § 9, stk. 4 kann ikki leggjast til grund fyri uppsøgn av lærusáttmálanum.
Stk. 5. Verður lærlingur útihystur frá skúlagongdini sambært § 30, fellur lærusáttmálin burtur.

§ 40. Ósemja millum lærling og læruplass kann einans verða løgd fyri viðkomandi yrkisnevnd, sum skal royna semju.
Stk. 2. Um so er, at semja ikki fæst í tag eftir 1. stk., kann málið verða lagt fyri eina sáttmálanevnd, smb. § 41.
Stk. 3. Ósemja kann ikki leggjast fyri dómstól ella aðrar myndugleikar enn teir, sum nevndir eru í stk. 1 og 2, samanber tó § 42, stk. 4.

§ 41. Trætur kunnu leggjast fyri eina sáttmálanevnd við 3 limum. Landsstýrismaðurin setur sáttmálanevndina. Yrkisfeløgini fyri avvarðandi yrkisgrein velja hvønn sín lim. Landsstýrismaðurin velur triðja limin, ið er formaður og skal verða løgfrøðingur.
Stk. 2. Landsstýrismaðurin ásetur gjøllari reglur fyri virkisøki sáttmálanevndarinnar.

§ 42. Sáttmálanevndin kann seta tærusáttmála úr gildi og taka støðu til spurningin um endurgjald.
Stk. 2. Sáttmálanevndin kann eisini taka støðu til spurningar um tulking av arbeiðsmarknaðarsáttmálum, tá ið sáttmálanevndarlimirnir eru samdir.
Stk. 3. Úrskurðirnir hjá sáttmálanevndini kunnu fullgerast eftir reglunum í rættargangslógini um tvingsilsfullgerð av dómum.
Stk. 4. Í seinasta lagi 8 vikur eftir úrskurð sáttmálanevndarinnar kunnu partarnir leggja málið fyri Føroya Rætt.

§ 43. Skúlin hevur skyldu at skaðatryggja teir lærlingar, sum eru í skúla samsvarandi hesi lóg, um lærlingarnir ikki á annan hátt eru skaðatryggjaðir undir skúlagongdini.

Kapittul 8
Aðrar ásetantr

§ 44. Landsstýrismaðurin kann í serligum føri, tá ið tað ræður um at fremja útbúgvingarroyndir, víkja frá reglunum í 3. og 4. kapitli í hesi lóg. Yrkisútbúgvingarráðið ger tilmæli um hetta.

§ 45. Landsstýrismaðurin ásetur, eftir tilmæli frá yrkisútbúgvingarráðnum, gjøllari reglur um undirvísingarførleika.

§ 46. Kærur um avgerðir skúlanna, kunnu, eftir gjøllari av landsstýrismannin ásettum reglum, leggjast fyri landsstýrismannin, samanber § 26, stk. 2.

Kapittul 9
Gildiskoma og skiftisreglur

§ 47. Lógin kemur í gildi 1. august 1998, tó soleiðis at 5. kapittul kemur í gildi 1. apríl 1998.
Stk. 2. Landsstýrismaðurin ásetur, eftir tilmæli frá yrkisútbúgvingarráðnum reglur um, hvussu lógin verður nýtt fyri yrkisútbúgvingar, ið eru byrjaðar, men ikki endaðar, áðrenn henda lóg kemur í gildi. Skulu higartil galdandi reglur nýtast, ásetur landsstýrismaðurin eisini reglur um at flyta virksemið, ið liggur hjá ráðum o.ø. eftir higartil galdandi reglum, til teir myndugleikar, sum skulu umsita skipanina eftir hesi lóg.
Stk. 3. Samstundis sum henda lóg kemur í gildi, fer løgtingslóg nr. 29 frá 12. oktober 1954 um lærlingaviðurskifti, við seinni broytingum, og løgtingslóg nr. 128 frá 21. mai 1993 um tøkniligar yrkisútbúgvingar, úr gildi.

Almennar viðmerkingar

Galdandi lógir og reglur um verandi yrkisútbúgvingar eru løgtingslóg nr. 29 frá 12. oktober 1954 lærlingaviðurskifti við seinni broytingum, løgtingslóg nr. 43 frá 5. mai 1987 um Føroya Yrkisskúla fyri fiskiídnað og havbúnað við seinni broytingum, løgtingslóg nr. 49 frá 5. mai 1987 um grundútbúgving innan fyrisitingar-, handils- og skrivstovuøkið við seinni broytingum, løgtingslóg nr. 47 frá 28. apríl 1992 um støðisútbúgving innan tøkni við seinni broytingum, løgtingslóg nr. 128 frá 21. mai 1993 um tøkniligar yrkisútbúgvingar við seinni broytingum, løgtingslóg nr. 127 frá 21. mai 1993 um hægri handilsútbúgving við seinni broytingum og løgtingslóg nr. 129 frá 21. mai 1993 um hægri tøkniliga útbúgving við seinni broytingum.

Skúla- og útbúgvingarskipanir í Føroyum hava í stóran mun havt danskar skipanir sum fyrimynd, tó so at summar broytingar eru gjørdar væl seinni í Føroyum, og viðhvørt hevur verið hildið fast við ta gomlu skipanina í Føroyum, hóast fleiri nyskipanir hava verið settar í verk í Danmark. T.d. kom danska efg-skipanin frá 70-unum omgantíð at virka í Føroyum á handverksøkinum. Vit hava varðveitt lærlingaútbúgvingarskipanina. Men FHS, sum Føroya Handilsskúli fór undir í 1983, hevur hesa efg-skipun sum fyrimynd.

Hóast efg-skipanin og aðrar danskar nyskipanir ikki hava verið settar í verk innan lærlingaútbúgvingina/-handverksvinnuna í Føroyum, er innihaldið av útbúgvingunum dagført, so hvørt broytingar hava verið í Danmark. Øll árini hevur neyvt samstarv verið við danskar skúla- og útbúgvingarmyndugleikar, so at t.d. lærlingar úr Føroyum eru farnir niður til Danmarkar at taka skúlapartar, ið ikki kunnu takast her heima.

Lágkonjunktururin í føroyska samfelagnum, sum byrjaði í 1989-90, rakti byggivinnuna serliga meint, og tí var lærlingatilgongdin á hesum øki lítil og eingin, tá fíggjarliga kreppan byrjaði í Føroyum. Løgtingið samtykti tí eina lóg um støðisútbúgving innan tøkni (SIT), so tey ungu, sum høvdu hug at fara undir eina útbúgving innan tøkni, í minsta lagi fingu eina 1-ára skúlagongd, ið var skipað sum støði undir framhaldandi útbúgving. Men av tí at vinnan ikki fekk lut í ábyrgd og stýring av SIT-skipanini, vórðu hesar útbúgvingar ikki góðtiknar sum partar av lærlingaútbúgvingunum. Síðan hava royndir verið gjørdar at fáa partarnar (t.e. vinnu- og skúlafólk) at gera eitt felags uppskot um broyting av SIT-lógini, so hon verður ein partur av yrkisskúla- og yrkisútbúgvingarlógarkompleksinum, og eitt uppskot um broyting av SIT-lógini verður samstundis lagt fyri løgtingið.

Uppskotið um yrkisútbúgvingarlóg snýr seg ikki um, hvussu tær einstøku útbúgvingarnar verða skipaðar, men um ein karm um heimildir og reglur á yrkisútbúgvingarøkinum.

Talan er um eitt uppskot um eina yrkisútbúgvingarlóg fyri handverk, handil v.m., sum øll vinnan tekur undir við. Bæði vinnan og skúlaverkið hava verið umboðað í 12-manna nevndini, sum tilevnaði álitið, ið liggur til grund fyri hesum lógaruppskoti.

Ein týðandi táttur í uppskotinum um eina yrkisútbúgvingarlóg er, at eitt útbúgvingarráð verður sett á stovn. Hetta ráð, sum í høvuðsheitum verður mannað við fólki úr vinnuni og sum skal koma við tilmælum til landsstýrismannin í undirvísingarmálum um viðurskifti viðvíkjandi yrkisútbúgvingunum, verður sett av landsstýrismanninum.

Til tess at viðgera spurningar viðvíkjandi teimum einstøku útbúgvingunum verða settar yrkisnevndir, sum m.a. skulu samtykkja innihaldið í útbúgvingunum og í ávísum málum geva yrkisútbúgvingarráðnum tilmæli.


Skipanin um yrkisútbúgvingarráð og yrkisnevndir kemur í staðin fyri skipanina um lærurráð og víðkað lærurráð.

Tað er umráðandi, at SIT-lógin frá 1992 verður broytt samstundis sum uppskotið um yrkisútbúgvingarlóg verður sett í gildi. Kjarnin í hesi broyting er, at yrkisútbúgvingarráðið ger tilmæli um tann yrkisliga partin av SIT-útbúgvingini. Hesi tilmæli byggja á samtyktir frá viðkomandi yrkisnevnd.

Lógaruppskotið fer at hava ein fíggjarligan meirkostnað fyri landskassan uppá kr. 300.000,-, orsakað av at yrkisútbúgvingarráðið nú kemur at telja 9 persónar, í mun til 3 persónar í nevndini fyri Føroya Lærurað (víðkað lærurráðið 5 persónar). Fundarvirksemi vænast at verða væl meira enn áður, umframt at fleiri og nýggj økir verða at ráðgeva um. Skrivstovuhaldið og -hjálp til yrkisútbúgvingarráðið og nevndir tess vænast eisini at økjast munandi orsakað av hesum.

12-manna nevndin, sum skrivaði "álit um yrkisútbúgvingarskipan", er tann fimta í røðini. Avvarðandi partar á arbeiðsmarknaðinum kenna álitið sera væl. Tí er lógaruppskotið ikki sent til ummælis hjá pørtunum.

RED: 10 X



Nasjonalbibliotek


Nasjonalbiblioteket


National Library of Norway

Rana Division


N-8607 Mo i Rana

Telephone: +47 75 12 11 11 Telefax: +47 75 12 12 2





RED: 10 X



Nasjonalbibliotek

Nasjonalbiblioteket

National Library of Norway

Rana Division

N-8607 Mo i Rana

Telephone: +47 75 12 11 11 Telefax: +47 75 12 12 2

LØGTINGS-TIDINDI

1997

Løgtingstiðindi 1997

Løgtingstíðindi 1997

(Bind 3)

Føroya løgting

Løgtingstíðindi 1997
© Føroya løgting
Fyriskipað av løgtingsskrivstovuni
Umbróting og prenting: Dimmalætting
Innbinding: Helge Justinussen

Serligar viðmerkingar

Að § 1: Landsstýrismannin um er í hesi lóg heimilað at skipa fyri yrkisútbúgvingum og arbeiðs-marknaðarútbúgvingum, herundir eftirútbúgving av yrkislærdum

Lógin avloysir verandi lóg frá 1954 um lærlingaviðurskifti.

Að § 2: Dentur verður lagdur á, at yrkisútbúgvingarnar eisini eru ungdómsútbúgvingar, og at tørvurin hjá arbeiðsmarknaðinum viðvíkjandi vinnu- og almennum førleika er nøktandi.

Að § 3: Meginreglan er, at skift verður millum verkliga læru á lærupláss og undirvísing í skúla. Skúlatíðin kann skifta frá 5 til 20 vikur. Útbúgvingarnar enda við útbúgvingarskjali, og endar útbúgvingin í flestu handverkaraútbúgvingum við einari sveinaroynd. Hetta eru somu meginreglur, sum eru galdandi í verandi lóggávu.

Að § 4: Landsstýrismaðurin í skúlamálum ásetur í kunngerð tær endaligu útbúgvingarreglurnar. Hetta er í samsvari við stýrisskipanarlógina um ráðharraábyrgd. (Smb. stk. 1).

Her nevnir lógin yrkisútbúgvingarráðið og yrkisnevndirnar á fyrsta sinni, og í stk. 2 og 3 verður víst til §§ 19-23 viðvíkjandi heimildum o.ø. hjá ráðnum og nevndunum.

At yrkisútbúgvingarráðið ger tilmæli er í samsvari við stýrisskipanarlógina, har landsstýrismaðurin fær ráðharraábyrgd, og hevur endaligu ábyrgdina av útbúgvingar- og skúlamálum. (Smb. stk. 2-3).

Að § 5: Ein útbúgving kann verða løgd niður í eitt ávíst tíðarskeið, uttan at verða tikin av, fyri síðani at verða tikin upp aftur. (Smb. stk. 1).

Talan er í høvuðsheitum um yrkisskúlar. Hesir eru: handilsskúlar og tekniskir skúlar. Sum frá líður møguliga eisini fiskivinnuskúlin. (Smb. stk. 3).

Að § 6: Reglan um, at tann, sum byrjar læru í einari yrkisútbúgving skal hava fylgt undirvísingini til frávaringarroynd fólkaskúlans (t.e. 9. flokk), er nýggj. Higartil hevur verið galdandi, at ein lærlingur skuldi vera lógliga útskrivaður úr fólkaskúlanum (t.e. 7-ára skúlagongd). (Smb. stk. 1).

Að § 7: Í fleiri yrkisútbúgvingum fer skúlagongdin fram í donskum yrkisskúlum. Tí er neyðugt, at avtalur verða gjørdar við skúlamyndugleikar og yrkisnevndir um skúlagongd og sveina- ella yrkisroyndir. (Smb. stk. 2).

Að § 8: Talan kann vera um eina góðskriving og stytting fyri næmingar, ið hava lokið aðra útbúgving, eitt nú grundútbúgvingina innan fyrisitingar-, handils- og skrivstovuyrki ella støðisútbúgvingina innan tøkni. (Smb. stk. 2).

Að § 9: Góðskriving av lærutíð ella skúlatíð hjá lærlingi við aðrari útbúgving ella arbeiðsroyndum verður samtykt av viðkomandi yrkisnevnd í hvørjum einstøkum føri.

Er talan um stytting av lærutíð, av tí at lærlingur frammanundan hevur lokið eina part av útbúgvingini ella hevur serligar fyritreytir til at fara undir ta útbúgving, lærusáttmáli fevnir um, kann viðkomandi yrkisnevnd, smb. § 35, samtykkja at stytta útbúgvingartíðina. (Smb. stk. 1).

Að §10: Stuðulsreglurnar eru at finna í lóg um yrkisskúlar. (Smb. stk. 1).

At skúlagongdin er ókeypis fyri lærlingar merkir, at skúli ikki kann krevja gjald frá lærlingum ella læruplássum fyri skúlagongdina. (Smb. stk. 5).

Ad. § 11: Ein týðandi táttur er, at útbúgvingin er dagførd og helst á odda í menningini í tøknifrøði, tilfari og fyriskipan á arbeiðsplássunum. (Smb. stk. 1-2).

Ad. § 12: Um býtið millum yrkisgreinar, lærugreinar og vallærugreinar hevur verið havt í huga, at skipanin, smb. § 2, skal menna tann einstaka og hjálpa viðkomandi til samfelagsliga fatan, leggja grundarlag undir framtíðar yrki og framhaldandi útbúgving, og at nøkta tørvin hjá vinnuni, tá ið ræður um fakligan førleika og almennan kunnleika. (Smb. stk. 1-4).

Ad. § 13: Miðað verður ímóti, at yrkislærugreinirnar í byrjanini av útbúgvingini hava eina stóra, fakliga breidd, men so hvørt smalkast til ta sergrein, lærlingurin hevur gjørt sáttmála í. (Smb. stk. 1-3).

Ad. § 14: Møguleikarnir til at velja vallærugrein eru avmarkaðir vegna lítla lærlingagrundarlagið í Føroyum, fíggjarkarmar skúlanna og tøka serkunnleikan millum lærarar. (Smb. stk. 1-2).

Ad. § 15: Samstundis sum lógin miðar ímóti, at útbúgvingin eisini skal verða ein ungdómsútbúgving, har lærlingurin fær undirvísing í almennum lærugreinum, miðar lógin eisini ímóti at javnstilla lærlingar, ið hava vantandi fortreytir, við aðrar lærlingar. (Smb. stk. 1-4).

Ad. § 16: Reglurnar eiga m.a. at fata um arbeiðstíðina hjá lærlingum, um feløgini á arbeiðsmarknaðinum ikki hava reglur hesum viðvíkjandi. (Smb. stk. 2).

Ad. § 17: Allir lærlingar skulu hava eitt útbúgvingarskjal, tá lærutíðin er lokin. Reglurnar um døming av lærlingum, sveinaroyndir o.a. miða móti einari stórari breidd í dømingarháttinum, bæði viðvíkjandi innihaldi og mannagongd í royndunum, herundir um møgulig sveinaroynd verður hildin, samanber § 18.

Ad. § 18: Um viðkomandi yrkisnevnd hevur samtykt, at sveina- ella yrkisroynd verður hildin í ávísari útbúgving, skulu upplýsingar hesum viðvíkjandi standa í sáttmálanum, og sveinabrævið verður í teimum før um partur av útbúgvingarskjalinum.

Ad. § 19: Ráðsskipanin við yrkisútbúgvingarráði og yrkisnevndum kemur í staðin fyri skipanina við læruráði og viðkaðum læruráði. Skipanin hevur fyrimynd í donsku lógini um yrkisútbúgvingar.

Ráðsskipanin hevur til endamáls at geva vinnuni neyðuga ávirkan á útbúgvingarskipanina, so hon í mest møguligan mun samsvarar við ynskini hjá vinnuni. (Smb. stk. 1).

Ráðsskipanin er sett saman av:
a) yrkisútbúgvingarráði við umboðum fyri vinnuna, og sum viðger yvirskipað mál og ger tilmæli til landsstýrismannin sambært teimum heimildum, tí eru givnar í hesi lóg og eftir viðtøkum, sum eru góðkendar av landsstýrismanninum, og
b) yrkisnevndum, sum samtykkja útbúgvingarreglurnar fyri tær einstøku útbúgvingarnar o.a. innan karmarnar av hesi lóg og eftir viðtøkum, sum eru góðkendar av ráðnum.

Ad. § 20: Í yrkisútbúgvingarráðnum hava arbeiðsgevarar og løntakarar eins stóra umboðan við 4 limum hvør. Landsstýrið sum arbeiðsgevari velur ein lim. Harumframt velur landsstýrismaðurin formannin, soleiðis at ráðið verður mannað við 9 limum.

Við verandi skipan á yrkisskúlaøkinum kunnu hesir skúlar senda eitt umboð á ráðsfund: Tekniski skúlin í Tórshavn, Tekniski skúlin í Klaksvík, Føroya Handilsskúli, Tórshavn, Føroya Handilsskúli, Kambsdalur, og Fiskivinnuskúlin, Vestmanna.

Ad. § 21: Meginreglan í ráðsskipanini er, at tað er útbúgvingarráðið, sum ger tilmæli til landsstýrismannin viðvíkjandi yrkisútbúgvingunum. Hugsandi er, at útbúgvingarráðið fer at hittast einar 4 ferðir um árið, har allir limirnir verða við í ráðsviðgerðini av einum máli, sama hvat yrki ella yrkisgrein, málið snýr seg um.

Ad. § 22: Uppgáva ráðsins at tilnevna yrkisnevndir er formlig, t.e. at ráðið sær til, at ein yrkisnevnd verður sett, men at viðkomandi yrkisfelag velur limirnar í nevndina.

Sum meginregla verða útreiðslurnar, ið standast av yrkisnevndararbeiðinum, goldnar av arbeiðmarknaðarpørtunum. (Smb. stk. 1-2).

Ad. § 23: Yrkisnevndirnar skulu taka upp spurningar viðvíkjandi teimum einstøku útbúgvingunum og samtykkja innihaldið í útbúgvingunum og í ávísum málum geva ráðnum tilmæli.

Ad. § 24: Við støði í teimum yvirskipaðu reglunum fyri hvørja útbúgving sær, sum yrkisnevndirnar gera, og sum yrkisútbúgvingarráðið ger tilmæli til landsstýrismannin um, verða ítøkiligar lesiætlanir gjørdar. Hesar lesiætlanir verða skúlarnir at gera.

Ad. § 25: Ein meginregla í skipanini er, at lærlingurin fær nøktandi upplæring í tí verkliga partinum í útbúgvingini. Læruplássini eiga tí at lúka neyðug krøv hesum viðvíkjandi. Viðkomandi yrkisnevnd er heimilað at ansa eftir, at tað einstaka virkið lykur hesi krøv. (Smb. stk. 1-2).

Ad. § 26: Samtyktin, um eitt virki kann góðkennast sum lærupláss, verður grundað á eina ítøkiliga meting. Ein yrkisnevnd eigur ikki at góðkenna lærupláss eftir føstum reglum, men eigur hinvegin at tryggja, at góðkenningin er í samsvari við stevnumiðini fyri útbúgvingina. (Smb. stk. 1).

Ad. § 27: Lærusáttmálin fatar um rættarstøðu millum lærling og lærupláss og skal fata um alla lærutíðina. (Smb. stk. 1-2).

Ad. § 28: Av tí at virki gerast alt meira sergreinað og lærlingur tí ikki altíð kann fáa nóg fjøltáttaða læru á einum læruplássi, kunnu læruplássini ganga saman um at útbúgva lærling. Læruplássini gera tá hvørt sær sáttmála fyri tað ávísa tíðarskeiði, sum samanlagt skulu fevna um alla lærutíðina. Eisini kann ávíst lærupláss sambært 2. stk. gera sáttmála, sum fevnir um alla lærutíðina, men at hetta lærupláss hevur ábyrgdina av, at lærlingurin í ávísum frammanundan ásettum tíðarskeiði kennur í læru á øðrum læruplássi. (Smb. stk. 1-2).

Ad. § 29: Reglan fatar um skyldu lærlingsins at luttaka í undirvísingini og skyldu hjá læruplássinum at geva lærlingi frá fyri at kunna luttaka í einari sáttmálaskyldugari skúlagongd. (Smb. stk. 1).

Ad. § 30: Neyðugt er, at heilt greiðar reglur eru um fráveru o.a. í undirvísingini. (Smb. stk. 1).

Ad. § 31: Sáttmáli millum lærupláss og lærling kann bert gerast um lógligu krøvini hjá báðum pørtum eru fullgyldug. Kravið til eitt lærupláss er, at tað er góðkent sum lærupláss í tí ávísu útbúgvingini, smb. § 26, meðan kravið til lærlingin er, smb. § 6, at undirvísingarskyldan er lokin. (Smb. stk. 1-2).

Ad. § 32: Broytingarnar, ið her verður sipað til, eru um uppsøgn av sínámillum avtalu, smb. § 38, stk. 1, um uppsøgn av sáttmálanum í royndartíðini, smb. § 38, stk. 2, og fráboðan um uppsøgn, smb. § 39, um semingsroyndirnar, smb. § 40, stk. 1, um rættarsøkina, smb. § 40, stk. 2, og avtaluna um leingjan av útbúgvingartíðini, smb. § 36.

Ad. § 33: Reglurnar hava við sær, at sáttmálaásetingin er bindandi fyri øll lærupláss og lærlingar í tí ávísu útbúgvingini, líka mikið um læruplássið er limur í einum arbeiðsgevarafelag, ella um lærlingur er limur í einum yrkisfelagi. (Smb. stk. 1-6).

Endurrindan / endurgjald eru galdandi fyri allar lærlingar. (Smb. stk. 4-6).

Ad. § 34: Umframt tær ásetingar, sum eru í sáttmálanum, galda eisini aðrar, almennar lógir, herfrá millum lóg um starvsmenn og frítíðarlógin. Hesar lógir eru yvirskipaðar í mun til sáttmálaásetingar. (Smb. stk. 1).

Ad. § 35: Tað veldst tó um, hvussu long tíð er gingin, síðan lærlingurin hevur lokið nevnda part. (Smb. stk. 1).

Ad. § 36: Lærupláss og lærlingur kunnu gera sínámillum semju um at leingja útbúgvingartíðina í tann mun lærlingurin er burtur frá læruplássinum grundað á tey í a) til d) nevndu viðurskifti. Læruplássið hevur fráboðanarskyldu viðvíkjandi broyting í útbúgvingartíðini.

Ad. § 37: Sum dømi um stytting av útbúgvingartíðini eftir hesi grein kann nevnast, at lærupláss heldur uppat, beint áðrenn lærlingurin hevur lokið útbúgvingartíðina, og at lærlingurin ikki kann fáa annað lærupláss. Sum dømi um leingjan av útbúgvingartíðini eftir hesi grein kann t.d. verða, at lærlingurin skal standa eina revsing.

Ad. § 38: Sáttmálaskeiðið í einum útbúgvingarsáttmála hevur gildi so leingi útbúgvingin varar. Vanligar avtalur á arbeiðsmarknaðinum um løn og tílíkt kunnu ikki ógilda ein útbúgvingarsáttmála. (Smb. stk. 1-3).

Ad. § 39: Lærusáttmáli kann ikki sigast upp, um lærlingur í eitt ávíst tíðarskeið verður útilhystur frá undirvísingini, fyri síðan seinni at byrja sama skúlaskeið aftur eftir reglunum um eykaundirvísing. (Smb. stk. 1-4).

Ad. § 40: Allar ósemjur um útbúgvingarsáttmála skulu leggjast fyri viðkomandi yrkisnevnd, sum skal royna semju. Bert tá ið yrkisnevnd ikki fær semju í lag, kann ósemja verða løgd fyri eina sáttmálanevnd. (Smb. stk. 2).

Ad. § 41: Tað er landsstýrismaðurin, sum setur sáttmálanevndina og tilnevnir limir hennara. Sáttmálanevndin hevur 3 limir: yrkisfeløgini fyri avvarðandi yrkisgrein velja hvønn sín lim og landsstýrismaðurin triðja limin, ið er formaður og skal verða løgfrøðingur. (Smb. stk. 1).

Ad. § 42: Partarnir hava møguleika at leggja úrskurð sáttmálanevndarinnar fyri Føroya Rætt.

Ad. § 43: Skaðatryggingin hjá lærlingum við lærusáttmála fylgir teimum reglum, ið gilda fyri lærlingar eftir verandi skipan. Teir næmingar, sum skúlin tekur upp til eina støðisútbúgving, og sum ikki hava lærusáttmála, hevur skúlin skyldu at skaðatryggja.

Ad. § 44: Um frávik frá reglunum í 3. og 4. látti verða framd, eiga hesi at verða greitt lýst, bæði tá ið viðvikur innihaldinum og tíðarkørmunum fyri ætlanini.

Ad. § 45: Reglurnar eiga, umframt at nøkta faklig førleikakrøv, eisini at verða samskipað við almennu førleikakrøvini hjá lærarum í miðnámsútbúgvingunum.

Ad. § 46: Sum dømi kunnu reglurnar fata um avgerð skúlanna um útihýsing av lærlingi frá undirvísingini, smb. § 30 og aðrar avgerðir, sum skúli tekur í sambandi við skúlagongdina hjá lærlingum, um reglur ikki á annan hátt eru ásettar.

Ad. § 47: Løgtingslóg nr. 49 frá 5. mai 1987 um grundútbúgving innan fyrisitingar-, handils- og skrivstovuyrkið og løgtingslóg nr. 47 frá 28. apr. 1992 um støðisútbúgving innan tøkni eiga at verða broyttar, so at hesar eru í samsvari við hesa lóg. Eisini eiga hesar lógir at fata um reglur, sum ásela, at ráðsskipanin hevur somu heimildir sum tær hava í hesi lóg við atliti at teimum yrkisligu pørtunum. (Smb. stk. 3).

Í viðgerð hósdagin 12. mars 1998. Uppskotið varð beint í mentamarnevndina.

Málið fall burtur sbr. stýrisskipanarlógini § 15 stk. 3, tí at løgtingsval var 30. apríl 1998, og málið ikki var liðugt viðgjørt á tingi fyri valið.

F.L. j.nr. 2116-18/90

108 Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um privatar skráir

Ár 1998, hósdagin 5. mars, legdi Eilif Samuelsen, landsstýrismaður, vegna Edmund Joensen, løgmann, vegna landsstýrið fram soljóðandi

Uppskot
til
løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um privatar skráir

§ 1.

Í løgtingslóg nr. 107 frá 15. november 1985 um privatar skráir við seinri broyting, verða gjørdar hesar broytingar:

1) Í § 2, stk. 2 verða orðini: "til vísindaligt ella hagfrøðiligt endamál ella" strikað.
2) Í § 2 verður sett sum stk. 3:

"Stk. 3. Lógin fevnir ikki um skráseting, ið einans verður gjørd við vísindaligum ella hagfrøðiligum endamáli. Skráseting við hesum endamálum av upplýsingum, sum nevndar eru í § 3, stk. 2, kann tó einans fara fram eftir fráboðan frammanundan til skrásetingareftirlitið. Skrásetingareftirlitið kann áseta nærri treytir fyri skránna fyri at verja privatlívið hjá teimum skrásettu, herundir um samtykki frá skrásetta, um striking og dagføring av upplýsingum og um trygdarfyriskipanir móti, at skráin verður misnýtt ella kemur til kunnleika hjá óviðkomandi."

§ 2.

Henda lóg kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

Viðmerkingar

Skrásetingareftirlitið hevur beitt á landsstýrið um at broyta lógina um privatar skráir, soleiðis at Skrásetingareftirlitið kann seta treytir til skráir til vísindaligt ella hagfrøðiligt endmál.

Henda regla stendur í donskt skrásetingarlógini, og upplýsir skrásetingareftirlitið, at tað í seinastuni hevur havt nøkur dømir uppá privatar edv-skráir til granskingarendamál, ið hava innihildið sera viðkvæmar upplýsingar um fólk. Mett verður, at tað er eitt hol í lógini, at eftirlitið ikki hevur kunna sett treytir til slíkar skráir.

Mett verður, at broytingin ikki fær fíggjarligar avleiðingar fyri landskassan.

Viðmerkingar til tær einstøku broytingarnar

Að 1) Orðini "til vísindaligt ella hagfrøðiligt endamál ella" standa ikki longur í § 2, stk. 2, har annars er ásett, hvat lógini ikki er galdandi fyri.

Að 2) Skrásetingar til vísindaligt og hagfrøðiligt endamál eru nú viðgjørdar í stk. 3, og sum høvuðsregla koma slíkar skrásetingar ikki undir lógina, men verður nú sett tann treyt, at Skrásetingareftirlitið skal hava fráboðan frammanundan, og kann eftirlitið seta treytir til skránna fyri at verja privatlívið hjá teimum skrásettu.

Mælt verður løgtinginum til at samtykkja uppskotið til broyting í løgtingslógini um pirvatar skráir.

1. viðgerð mánadagin 16. mars 1998. Uppskotið verður heint í nevndarvanlina.

Málið fall burtur sbr. stýrisskipanarlógini § 15 stk. 3, tí at løgtingsval var 30. apríl 1998, og málið ikki var liðugt viðgjørt á tingi fyri valið.

F.L. j.nr.: 650-1/94

109 Uppskot til løgtingslóg um yvirtøku av "Færøernes Realkreditinstitut"

Ár 1998, hósdagin 5. mars, legði Eilif Samuelsen, landsstýrismaður, vegna Edmund Joensen, løgmann, vegna landsstýrið fram soljóðandi

Uppskot
til
løgtingslóg um yvirtøku av "Færøernes Realkreditinstitut"

§ 1. Við heimild í § 2 í heimastýrislógini, yvirtekur heimastýrið "Færøernes Realkreditinstitut", smb. nr. 15 í lista A, sum føroyskt málsøki.

§ 2. Galdandi lógir á økinum verða verandi í gildi, til tær verða settar úr gildi við løgtingslóg. Tær heimildir, sum danskir myndugleikar hava, verða framyvir hjá heimastýrinum.

§ 3. Henda lóg kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

Viðmerkingar

Forsætismálaráðið hevur um ríkisumboðið fleiri ferðir heitt á Føroya Landsstýri um skjótast gjørligt at taka stig til, at "Færøernes Realkreditinstitut" verður yvirtikin sum føroyskt sermál sambært heimastýrislógini § 2, lista A, pkt. 15.

Eftir § 2, pkt. 3 í heimastýrislógini, skal heimastýrið yvirtaka mál og málsøki, nevnd á lista A, tá ríkisvaldið ynskir tað.

Tvær ferðir áður er uppskot lagt fyri tingið um at yvirtaka realkreditstovnin, men báðar ferðirnar fullu málini burtur.

Samstundis sum uppskot til løgtingslóg um at yvirtaka "Færøernes Realkreditinstitut" verður lagt fyri tingið, leggur landsstýrismaðurin í fíggjarmálum uppskot fyri tingið um at gera nýggja føroyska lóg fyri tann yvirtikna Føroya Realkreditstovn.

Lógaruppskotið hevur ongar eykaútreiðslur við sær fyri landsskassan.

1. viðgerð týsdagin 17. mars 1998. Uppskotið varð heint í fíggjarnevndina.

Málið fall burtur sbr. stýrisskipanarlógini § 15 stk. 3, tí at løgtingsval var 30. apríl 1998, og málið ikki var liðugt viðgjørt á tingi fyri valið.

F.L.j.nr. 130-3/98

110 Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um flaggið

Ár 1998, hósdagin 5. mars, legði Eilif Samuelsen, landsstýrismaður, vegna Edmund Joensen, løgmann, vegna landsstýrið fram soljóðandi

Uppskot
til
løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um flaggið

§ 1.

Í løgtingslóg nr. 42 frá 17. juli 1959 um flaggið verða gjørdar hesar broytingar:

1) Í § 1 verður aftaná orðið "fagurreyður" sett: "(PMS 186)".
2) Í § 1 verður aftaná orðið "azurblárandaður" sett: "(PMS 3005)".

§ 2.

Henda lóg kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

Viðmerkingar

Í lógini um flaggið er ásett, at reyði liturin í flagginum er fagurreyður og blái liturin er azurbláur.

Flaggframleiðarar, prentsmiðjur, málarar og onnur við skili fyri hesum, og sum nýta litirnar í arbeiði sínum, eru á einum máli um, at illa ber til nágreiniliga at siga, hvussu litirnir fagurreyður og azurbláur sær út. Hetta letur seg gera, um ásett verður, hvørji altjóða numrini á litunum eru.

1. viðgerð mánadagin 16. mars 1998. Uppskotið verður beint í ræturnevndina.

Málið fall burtur sbr. stýrisskipanarlógini § 15 stk. 3, tí at løgtingsval var 30. apríl 1998, og málið ikki var liðugt viðgjørt á tingi fyri valið.

F.L. j.nr.112-3/93

111 Góðkenning av Millumlandasáttmála um Havumhvørvisvernd fyri Landnyrðingsatlantshav (Convention for the Protection of the Marine Environment of the North-East Atlantic)

Ár 1998, hósdagin 5. mars, legði Eilif Samuelsen, landsstýrismaður, vegna Edmund Joensen, løgmann, vegna landsstýrið fram soljóðandi

Uppskot
til
samtyktar

Løgtingið góðkennir, at landsstýrið mælir ríkismyndugleikunum til at seta í gildi fyri Føroyar Millumlandasáttmálan um Havumhvørvisvernd fyri Landnyrðingsatlantshav

Mælt verður ríkismyndugleikunum til at seta í gildi fyri Føroyar hjálagda uppskot til kongliga fyriskipan um gildisseting fyri Føroyar av Millumlandasáttmálanum um Havumhvørvisvernd fyri Landnyrðingsatlantshav.

Viðmerkingar

Millumlandasáttmálin um Havumhvørvisvernd fyri Landnyrðingsatlantshav verður í vanligari talu nevndur OSPAR sáttmálin.

Á einum ráðharrafundi í september 1992 í Oslo og Parisnevndunum varð omanfyrinevndi millumlanda sáttmáli undirritaður av teim 14 londunum, sum vóru samráðingarpartar í teim eldru sáttmálunum, umframt Sveits og eitt umboð fyri ES nevndina.

Í sambandi við donsku undirritingina av OSPAR sáttmálanum tók Danmark fylgjandi fyrivarni fyri Føroyar:

"The present Convention is subject to ratification and with reservation for application to the Faroe Islands."

Umframt at leggja báðar eldrut Oslo og Parissáttmálarnar saman, vórðu hesir báðir nýggju sáttmálarnir endurskoðaðir og dagførdir.

Sáttmálin hevur til endamáls at fremja allar fyriskipanir, sum eru møguligar til tess at fyribyrgja og vinna á dálking av havinum. Fyri at varðveita heilsu hjá fólki og vistskipanirnar í havinum, hevur sáttmálin harafturat til endamáls at fremja neyðugar fyriskipanir til tess at verja havøkið móti skaðaárinum, sum kunnu standast av mannaávum.

Sáttmálin er skipaður við einum altuennum tekstí, sum lýsir týdningarmestu broytingarnar í mun til teir gomlu sáttmálarnar, og eru besar meginreglur settar inn:

- meginreglan um varsemi
- meginreglan um at dálkarin skal gjalda
- meginreglurnar um at nýta best atkomandi tøknifrøðina og bestu umhvørvisligu royndirnar umframt reinari tøknifrøði.

Sáttmálin inniheldur eitt forboð ímóti iðnaðardumping og brenning av burturkasti á havinum og frá 1998 dumping av kloakkevju. Sáttmálin bannar harumframt dumping av geislavirknum burturkasti í minsta lagi 15 ár frá 1 januar 1993 at rokna.

Harumframt inniheldur sáttmálin ásetingar um, at hann sjálvur eisini kann fevna um annað virksemi, sum kann skaða havumumhvørvið, og at Nevndin kann taka løgfrøðiliga bindandi avgerðir.

Samhært grein 1 hevur sáttmálin eisini gildi fyri innaru farvøtn.

Sáttmálin er skipaður við hesum fyra fylgiskjølum, ið eru at rokna sum partur av sáttmálanum:

- fyribyrging og oyðing av dálking, sum stavar frá landi
- fyribyrging av dálking, sum stavar frá dumping og brenning
- fyribyrging og oyðing av dálking frá frálandakeldum
- meting av góðskuni av havumhvørvinum

Samhært grein 7 í lóg um heimastýri skulu altjóða sáttmálar, sum krevja samtykki frá fólkatinginum, og sum innihalda ásetanir fyri Føroyar, leggjast fyri føroyska heimastýri.

Frá danskari síðu metti Miljøstyrelsen, at ein góðkenning av OSPAR sáttmálanum ikki krevdi samtykki frá fólkatinginum. Harumframt var mett, at sáttmálin hvørki hevði búskaparligar ella løgfrøðiligar avleiðingar fyri Danmark, sum gingu út yvir longur galdandi skyldur í øðrum millumlandasáttmálum, sum vóru lógarfestar í umhvørvisverndarlógini og í havumhvørvislógini frá juni 1993.

Landsstýrismaðurin hevur sent Heilsutrøðiligu Starvsstovuni OSPAR sáttmálan til umsagnar, soleiðis at Danmark kann góðkenna OSPAR sáttmálan uttan fyrivarni fyri Føroyar.

Í unnælinum frá Heilsufrøðiligu Starvsstovuni verður nett, at sáttmálin ikki er í andsøgn við galdandi umhvørvisverndarlógir.

Tær eru løgtingslóg nr 134 frá 29.10.88 um umhvørvisvernd og *Ansvarsting nr. 318 af 26.6.85 om ikrafttrædelsen for Færøerne af lov om beskyttelse af havmiljøet.* Nærum alt fellir innanfyri karmarnar av galdandi lóggávu, men tað eru undantøk, serliga avmarkingin móti dumping av skipum.

Heilsufrøðiliga Starvsstovan mælir til, at OSPAR sáttmálin verður settur í gildi fyri Føroyar við støði í niðanfyristandandi:

"Tað hevur týdning fyri alla okkara umhvørvisvernd, at Føroyar luttaka positivt og aktivt í arbeiðnum við at menna altjóða konventiónir, sum eru galdandi á okkara leiðum, og sum fyrst og fremst hava til endamáls at verja okkara felags havumhvørvi, so tað í minst møguligan mun verður dálkað av menniskjans ávum."

Hjálagt:
1. OSPAR sáttmálin
2. Upprit frá Miljøstyrelsen frá 14. august 1995 viðvíkjandi: "Ratifikation af konventionen om beskyttelse af havmiljøet i det nordøstlige Atlanterhav (OSPAR)."

1. viðgerð hósdagin 12. mars 1998. Uppskotið varð beint í trivnaðarnevndina.

Málið fall burtur sbr. stýrisskipanarlógini § 15 stk. 3, tí at løgtingsval var 30. apríl 1998, og málið ikki var liðugt viðgjørt á tingi fyri valið.

F.L.j.nr. 90-11/98

112 Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um búskaparráð

Ár 1998, hósdagin 5. mars, legði Anfinn Kallsberg, landsstýrismaður, vegna landsstýrið fram soljóðandi

Uppskot
til
løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um búskaparráð

§ 1.

Í løgtingslóg nr. 120 frá 12. juli 1995 um búskaparráð sum broytt við løgtingslóg nr. 74 frá 20. mai 1996 verða gjørdar hesar broytingar:

1) Í § 1 verður "Landsstýrið" broytt til: "Landsstýrismaðurin í búskaparmálum".
2) Í § 2 verður "Landsstýrið" broytt til: "Landsstýrismaðurin í búskaparmálum".
3) § 2a verður orðað soleiðis:
   "**§ 2a.** Ráðið skipar seg við formanni. Formaðurin og tveir av hinum limunum skulu hava útbúgving sum búskaparfrøðingar. Hesir triggir limirnir eru formansskapurin."
4) § 3 verður orðað soleiðis:
   "**§ 3.** Búskaparráðið kemur saman minst tvær ferðir um árið eftir avgerð formansins ella eftir áheitan frá minst 4 limum í ráðnum.
   Stk. 2. Eftir umrøðu í ráðnum ger formansskapurin minst eina ferð um árið frágreiðing um gongdina í føroyska búskapinum, har mett verður um búskaparligu støðuna, útlitini framyvir, og hvørji tiltøk eiga at verða framd. Formansskapurin kann saman við frágreiðingini geva eina samandrátt av limanna sjónarmiðum, sum koma fram í umræðuni. Formansskapurin hevur ábyrgdina av frágreiðingini.
   Stk. 3. Ráðið kann gera avtalu við stovnar/persónar um hjálp til kanningararbeiði fyri ráðið."
5) Í § 4, stk. 2 verður "landsstýrinum" broytt til: "landsstýrismanninum í búskaparmálum".
6) Í § 5 verður "Landsstýrinum" broytt til: "Landsstýrismaðurin í búskaparmálum".

§ 2.

Henda lóg kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

Viðmerkingar
Løgtingslóg nr. 74 frá 20. mai 1996 um broyting í løgtingslóg um búskaparráð var soleiðis orðað, at § 3, stk. 2-4 í løgtingslóg nr. 120 frá 12. juli 1995 um búskaparráð, duttu burtur. Hetta var ongantíð ætlanin, og verða tí somu reglur settar aftur í lógina við broyting nr. 4), tó undantikið reglunar um tagnarskyldu, tí her galda reglurnar í § 26 í løgtingslóg nr. 132 frá 10. juni 1993 um fyrisiting. Hildið verður, at tað ikki er neyðugt at áseta aðrar reglur fyri limirnar í búskaparráðnum og fyri fólk, sum starvast á skrivstovuni hjá búskaparráðnum, enn tær vanligu reglurnar um tagnarskyldu hjá teimum, sum starvast innan almenna fyrisiting.

Samstundis við at § 3, stk. 2 aftur verður sett í lógina, verður nágreinað, hvør skal gera frágreiðingar um gongdina í føroyska búskapinum, og hevur ábyrgdina av frágreiðingunum. Í § 3, stk. 2 í løgtingslóg nr. 120 frá 12. juli 1995, tá tað burtur við broytingini í 1996, stóð, at búskaparfrøðingarnir minst eina ferð um árið skuldu gera ein frágreiðing um gongdina í føroyska búskapinum, og at búskaparfrøðingarnir skuldu hava ábyrgdina av frágreiðingini. Í prinsippinum kunnu allir 7 limirnir í búskaparráðnum vera búskaparfrøðingar, og soleiðis ábyrgjast fyri frágreiðingini og innihaldi hennara. Hetta varð ongantíð ætlanin við orðingini "búskaparfrøðingarnir". Við orðinum "búskaparfrøðingarnir" skuldi hert skiljast formaðurin og teir tveir limirnir, sum sambært § 2a skulu hava útbúgving sum búskaparfrøðingar. Fyri at nágreina, at tað eru hesir 3 limirnir, sum hava ábyrgdina av frágreiðingini, verða teir 3 limirnir nevndir formannsskapurin í hesum lógaruppskoti. Hetta verður gjørt við broyting nr. 3), § 3, stk. 2 verður tillagað hesum.

Nýggja stýrisskipanarlógin kom í gildi á ólavsøku 1995, og við henni varð fyrisitingarliga ábyrgdin av ymsu málsøkjunum løgd til einstøku landsstýrismenninar. Broyting 1), 2), 5) og 6) eru gjørdar, so lógin svarar til nýggju stýrisskipanarlógina.

1. viðgerð miðvikudagin 18. mars 1998. Málið varð beint í figgjarnevndina

Málið fall burtur sbr. stýrisskipanarlógini § 15 stk. 3, tí at løgtingsval var 30. apríl 1998, og málið ikki var liðugt viðgjørt á tingi fyri valið.

F.L.j.nr. 2513-4/94

113 Uppskot til ríkislógartilmæli um "lov om videnskabsetisk komitésystem og behandling af biomedicinske forskningsprojekter"

Ár 1998, hósdagin 5. mars, legði Kristian Magnussen, landsstýrismaður, vegna landsstýrið fram soljóðandi

Uppskot
til
ríkislógartilmæli um "lov om videnskabsetisk komitésystem og behandling af biomedicinske forskningsprojekter"

Mælt verður ríkismyndugleikunum til at seta í gildi fyri Føroyar hjálagda uppskot til kongliga fyriskipan um at seta í gildi fyri Føroyar "lov om videnskabsetisk komitesystem og behandling af biomedicinske forskningsprojekter".

Viðmerkingar
Í 1986 setti Læknafelag Føroya á stovn eina vísindaetiska nevnd. Landsstýrið hevur í hesa nevnd valt 3 limir

og 3 tiltakslimir og læknafelagið hevur valt 3 limir. Nevndararbeiðið er ólønt, ein skrivari verður tó tímaløntur av Læknafelag Føroya.

Hendan nevndin hevur virkað til í dag og hevur hildið umt. 10 fundir um árið. Nevndin arbeiðir í lotuni eftir "Helsinki deklaratiónini II", men trupulleikar hava staðist av, at ongar nærri retningslinjur eru viðvikjandi arbeiðinum hjá nevndini. Nevndin hevur ikki sonn heimildir, sum tær donsku nevndirnar hava, til at meta um biomedisinskar granskingarverkætlanir og at seta hesar í verk, og tað er ikki lýst, hvørjar granskingarverkætlanir kunnu verða gjørdar og hvørjar ikki kunnu verða gjørdar. Truputt er eisini hjá nevndini at virka, uttan at hava eina yvirordna nevnd at ráðføra seg við.

Við hjálagda uppskoti verða omanfyri nevndu trupulleikar loystir, tá ið lógin regulerar virksemi hjá føroysku vísindaetisku nevndini. Fyrimunurin við hesari skipan er eisini, at føroyska nevndin verður tengd at "Den centrale videnskabsetiske komité", sum er yvirordna instansurin hjá regionalu nevndunum í Danmark. Soleiðis kunnu føroyingar fáa neyðugta vegletðing frá yvirordnaðu nevndini, samstundis sum skipanin ikki verður so dyr hjá føroyingum at umsita.

Endamálið við lógini er at áseta nærri rammur fyri tí vísindaetisku metingini av biomedisinskum granskingarverkætlanum.

Í Danmark er skipanin uppbygd við einum ávísum tali av regionalum vísindaetiskum nevndum og einari sentralari vísindaetiskari nevnd, sum samskipar arbeiði hjá regionalu nevndunum.

Føroyska regionala vísindaetiska nevndin skal sambært uppskotinum virka í donsku skipanini sum ein regional nevnd undir sentralu vísindaetisku nevndini . Í tí føroysku nevndini skulu sita 7 limir. 4 limir verða valdir av landsstýrismanninum og 3 limir verða valdir av Føroya Læknafelag. 2 av limunum í nevndini verða valdir at sita í sentralu vísindaetisku nevndini.

Uppgávan hjá føroysku vísindaetisku nevndini verður sambært uppskotinum, at gera eina fakliga og etiska meting uv teimum í grein 6 nevndu granskingarverkætlanum, sum ætlanin er at seta í verk í Føroyum. Um nevndin metir granskingarverkætlanina verða ráðiliga, gevur nevndin loyvi til, at royndin kann setast í verk. Nevndin hevur harnæst eftirlit við, at royndin verður gjørd í samsvar við tað givna loyvið.

Tann sentrala vísindaetiska nevndin í Danmark samskipar arbeiði ímillum regionalu nevndirnar í Danmark og í Føroyum, fylgir við í granskingarmenningini, viðgerð ávísar granskingarverkætlanir sambært lógini, vegleiðir regionalu nevndirnar, ásetir nærri retningslinjur fyri regionalu nevndirnar og virkar sum kærunyndugleiki í mun til regionalu nevndirnar.

Av tí at málsøkið ikki er yvirtikið, er heimild fyri at seta lógina í gildi fyri Føroyar við kongligari fyriskipan.

Mett verður, at fíggjarligi kostnaðurin av uppskotinum verður umt. 50.000 kr. um árið. Tað er væntandi, at teir 7 limirnir í nevndini fara at hava umt. 10 fundir um árið. Til hesar fundirnar rindar landsstýrismaðurin limunum í nevndini fundarpening og ferðaútreiðslur eftir vanligum reglum, galdandi fyri tænastumetn. Møguleiki er eistni fyri í kongligu fyriskipanini, at landsstýrismaðurin ásetur reglar um, at limirnir, umframt hetta, kunnu fáa dag- og tímapening eftir vanligum reglum, galdandi fyri tænastumetn og endurgjald fyri mista arbeiðsinntøku, og at formaðurin, næstformaðurin og skrivarin kunnu fáa viðbót/løn fyri sítt arbeiði. Harumframt kunnu standast útreiðslur uv, at teir 2 føroysku limirnir í centralu vísindaetisku nevndini skulu fáa ferðaútreiðslur til Danmarkar goldnar í samband við fundir í centralu vísindaetisku nevndini.

Fyri fíggjarárið 1998 verða útreiðslurnar til føroysku vísindaetisku nevndina í fyrstu syftu goldnar av játtanini hjá Almanna- og heilsumálastýrinum. Fyriskipanin fær gildi frá 1.august 1998, og tí verður roknað við, at útreiðslurnar fyri 1998 verða umt. 25.000 kr.

Tekstarin í hjálagda uppskoti er tilfagaður føroysk viðurskifti, soleiðis at ásett verður, hvussu føroyska vísindaetiska nevndin skal verða uppbygd og hvussu samhandið imillum føroysku vísindaetisku nevndina skal verða í mun til tað sentralu vísindaetisku nevndina í Danmark. Eisini verður lógin broytt soleiðis, at hon í staðin fyri at áseta hvørjar uppgávur donsku nevndirnar hava, ásetir hvørjar uppgávur føroyska nevndin skal havu.

Tann heimildin, sum í donsku lóggávuni er hjá "Staten" ella "Amtskommunen", er í hjálagda uppskoti løgd til landsstýrismannin í heilsumálum. Somuleiðis eru úteiðslurnar av føroysku nevndini lagdar til Almanna og heilsumálastýrið. Landsstýrismaðurin í heilsumálum hevur í løtuni føroysku vísindaetisku nevndina undir sær. Nevndin skal virka fyri gransking um alt landið, so eingin grund er til at leggja ábyrgdina viðvíkjandi nevndunum í kommununum.

Samboert § 4, stk. 2 í uppskotinum verða tveir limir valdir úr føroysku vísindaetisku nevndini í "Den centrale videnskabsetiske komité". Skotið verður upp, at limirnir bert hava observatørstatus í centralu vísindaetisku nevndini, men tá ið talan er um føroysk viðurskifti, skulu føroysku limirnir luttaka á jøvnum føti við hinar limirnar í nevndini.

Av tí at ein nýggj lóg nr. 460 frá 10. juni 1997 "om kunstig befrugtning ifb. lægelig behandling, diagnostik og forskning m.v." er sett í gildi í Danmark, eru broytingar gjørdar í donsku lógini "om Videnskabsetisk komitésystem og behandling af biomedisinske forskningsprojekter", soleiðis at §§ 14 og 15 eru uvtiknar og nýggjar reglur hesum viðvíkjandi eru gjørdar í omanfyrinevndu lóg nr. 460 frá 10. juni 1997. Tann einasta veruliga broytingin í mun til tekstin í komitélógini er, at regionalu komitéirnar nú sjálvar kunnu góðkenna eina granskingarverkætlan viðvíkjandi gitnum eggum. Í fyrnverandi §§ 14 og 15 krevdist ein góðkenning bæði frá regionalu komitéini og frá centralu vísindaetisku komitéini fyri at kunna fara undir eina slíka granskingarverkætlan.

Skotið verður upp at broyta §§ 14 og 15 í lógini, soleiðis at greinirnar samsvara við lóg nr. 460 frá 10. juni 1997. Tá ið centrala vísindaetiska nevndin ikki samboert donskum reglum skal taka støðu til granskingarverkætlanir viðvíkjandi gitnum eggum, kann ikki hugsast, at komitéin er til reiðar at viðgera slík føroysk mál. Tá ið danir hava strikað hesa "dupultgóðkenning" verður mett, at vit eisini eru noydd til at strika hesa manngongd úr føroysku skipanini.

§ 16, stk. 3 í uppskotinum er broytt í mun til orðingina í donsku lógini, soleiðis at føroyska nevndin fær fundarsamsýningar o.a. samboert føroyskum reglum, galdandi fyri tænastumenn. Landsstýrismaðurin kann eisini avgera, at limirnir fáa dag- og tímapening eftir vanligum reglum, galdandi fyri tænastumenn og endurgjald fyri mista arbeiðsinntøku og at formaðurin og næstformaðurin í nevndini fáa eykasamsyning fyri teirra arbeiði í nevndini. Harumframt kann landsstýrismaðurin avgera, at rinda annan kostnað í sambandi við arbeiðið hjá nevndini. Hetta kann t.d. verða at gjalda fyri skrivara fyri nevndina.

Harumframt eru tilvísingarnar í lógini broyttar, soleiðis at tær samsvara við lóggávuna í Føroyum.

Gildiskomureglurnar í hjálagda uppskoti eru eisini øðrvísi enn í donsku lógini. Føroyska fyriskipanin fær gildi frá 1. august 1998.

Uppskotið hevur verið til hoyringar hjá Læknafelag Føroya, føroyskur vísindaetisku nevndini, landsapotekaranum, landslæknanum, sjúkrahússtjóranum og danska "Forskningsministeriet", sum hevur "lov om videnskabsetisk komitésystem..." um hendi.

Føroya Læknafelag tekur undir við uppskotinum uttan viðmerkingar.

Almanna- og heilsumálastýrið hevur ikki móttikið hoyringssvar frá "forskningsministeriet".

Føroyska vísindaetiska nevndin mælir til, at nakrar greinir í uppskotinum verða broyttar. At § 3 verður broytt soleiðis, at landsstýrismaðurin velur 2 tiltakslimir í føroysku nevndina og læknafelagið velur 2. Hetta er tikið partvíst til eftirtektar í uppskotinum, soleiðis at landsstýrismaðurin samtaeri § 3 velur 2 tiltakslimir í nevndina og læknafelagið velur 1.

Vísindaetisku nevndin mælir eisini til, at § 6 í uppskotinum verður broytt, soleiðis at føroyska vísindaetiska nevndin skal kunna viðgera allar verkætlanir, ið hava við Føroyar at gera. Landsstýrismaðurin hevur broytt uppskotið samsvarandi hesum viðmerkingum.

Vísindaetiska nevndin ger vart við, at nýggj lóg um "lov om kunstig befrugtning i forbindelse med lægelig behandling, diagnostik og forskning m.v." er komin í gildi í Danmark og at tað tí er neyðugt at broyta uppskotið. Hetta er tikið til eftirtektar og uppskotið er broytt samsvarandi nýggju lógini.

Landsstýrismaðurin hevur eisini broytt uppskotið samsvarandi ynskinum hjá vísindaetisku nevndini um, at nøguleiki skal verða fyri at landsstýrismaðurin kann rinda fyri skrivaraarbeiðið í sambandi við arbeiði í vísindaetisku nevndini smb. § 16, stk. 3.

Landsapotekarin mælir til, at § 7, stk. 3 verður broytt, soleiðis at uppskotið samsvarar við "Løgtingslóg nr. 104/88 um apoteksverkið og heilivág". Uppskotið er broytt samsvarandi hesum viðmerkingum.

Landslæknin metir, at føroyingar ikki áttu at hatt eina sjálvstøðuga regionala vísindaetiska nevnd, men at føroyska nevndin í staðin átti at verið ein partur av einari regionalari nevnd í Danmark. Bornholm t.d. hevur ikki eina sjálvstøguða regionala vísindaetiska nevnd, men hevur sligið seg saman í eina regionala nevnd saman við Frederiksborg-, Roskilde-, Storstrøms- og Vestsjællands amt. Í hesi nevnd hevur Bornholm 2 limir, ið amtsráðið hevur tilnevnt. Íbúgvararnir í hesum 5 donsku amtunum eru tilsamans umt. 1 millión íbúgvar. Í Danmark eru tilsamans 7 regionalar vísindaetiskar nevndir. Bornholm hevur einki umboð í centralu vísindaetisku nevndini, men ístaðin sita tveir persónar frá hinum amtunum í vísindaetisku nevndini, sum Bornholm er limur av, sum umboð. Landslæknin metir ikki, at vit hava fakliga førleikan til at seta á stovn eina sjálvstøðuga regionala etiska nevnd í Føroyum.

Landsstýrismaðurin metur, at føroysku umstøðurnar viðvíkjandi gransking eru so sermerktar, at neyðugt er at hava eina sjálvstøðuga regionala vísindaetiska nevnd í Føroyum. Um vit skulu verða ein partur av eini regionalari nevnd í Danmark, er vandi fyri, at okkara áhugamál falla burturímillum. Viðvíkjandi fakliga førleikanum, so verður mett, at hesin er til staðar í Føroyum. Um nevndin er í iva um eitthvørt, kann hon søkja sær ráð og vegleiðing frá centralu nevndini í Danmark og um borgari er ónøgdur við avgerð tiknað av nevndini, er tað møguligt at kæra avgerð tiknað av føroysku nevndini til centralu nevndina. Tí er eingin vandi á ferð við at seta eina sjálvstøðuga føroyska vísindaetiska nevnd. Uppskotið verður tí ikki broytt samsvarandi viðmerkingunum hjá Landslæknanum.

Sjúkrahússtjórin tekur undir við uppskotinum, men mælir til, at § 16, stk. 3 verður broytt soleiðis, at upphæddirnar upp til 25.000 kr. til formannin og upp til 20.000 kr. til næstformannin í samsýning um árið, verða broyttar. Hetta er tikið til eftirtektar í uppskotinum, soleiðis at samsyningarupphæddirnar ikki standa í § 16, stk. 3.

Udkast til
Anordning om
ikrafttræden på Færøerne
af
lov om et videnskabsetisk komitésystem og behandling af biomedicinske forskningsprojekter

I henhold til § 20 i Lov nr. 503 af 24. juni 1992 om lov om et videnskabsetisk komitésystem og behandling af biomedicinske forskningsprojekter, jf. lovbek. nr. 221 af 4.marts 1997, fastsættes herved, at loven skal være gældende for Færøerne i følgende skikkelse:

Kapitel 1

Komitésystemet

§ 1. Loven har til formål at fastlægge de retlige rammer for den videnskabsetiske bedømmelse af biomedicinske forskningsprojekter.

Stk. 2. Det videnskabsetiske komitésystems opgave er at sikre beskyttelsen af forsøgspersoner, der deltager i biomedicinske forskningsprojekter, samtidig med at der skabes mulighed for udvikling af ny, værdifuld viden.

§ 2. Landsstyremanden nedsætter den færøske regionale videnskabsetiske komité.

§ 3. Den færøske regionale komité består af mindst 7 medlemmer, hvoraf 4 udpeges af Landsstyremanden og 3 udpeges af den færøske lægeforening. Derudover udpeges 3 suppleanter, hvoraf Landsstyremanden udpeger 2 og den færøske lægeforening udpeger 1.

Stk. 2. Skønner Landsstyremanden, at hensynet til den færøske regionale komité's virke, projekternes antal eller andre grunde taler derfor, kan en komité bestå af 9, 11, 13 eller 15 medlemmer. Ved et medlemstal på 9, 11, 13 eller 15 indstilles 4 respektive 5, 6 eller 7 af den færøske lægeforening.

Stk. 3. Den færøske regionale komité vælger selv sin formand og næstformand blandt de udpegede medlemmer. Komitéen kan vælge at udpege 2 næstformænd.

Stk. 4. Den færøske regionale komité udarbejder forslag til vedtægter, der godkendes af den centrale komité.

Stk. 5. Komitéens medlemmer udpeges for 4 år ad gangen svarende til lagtingets valgperiode. Genudpegning af medlemmerne kan ske en gang.

§ 4. Forskningsministeren nedsætter Den centrale videnskabsetiske komité i Danmark. Komitéen består af 2 medlemmer udpeget af hver af de regionale komitéer i Danmark, 2 medlemmer udpeget af den færøske videnskabsetiske komité, samt 2 medlemmer udpeget af forskningsministeren og 2 medlemmer udpeget af sundhedsministeren.

Stk. 2. Af de medlemmer der udpeges af den færøske regionale komité, vælges et blandt de medlemmer, der er indstillet af den færøske lægeforening. Det andet vælges blandt komitéens øvrige medlemmer. De 2 medlemmer af den færøske videnskabsetiske komité har observatørstatus med taleret i den centrale videnskabsetiske komité, men deltager på lige fod med de andre medlemmer i komitéarbejdet i sager der vedrører Færøerne, bortset fra ankesager fra den færøske regionale komité.

Stk. 3. Det ene af de medlemmer, der udpeges af forskningsministeren , skal repræsentere statslige forskningsinteresser. Det andet medlem samt de 2 medlemmer, der udpeges af sundhedsministeren, skal repræsentere folkeoplysende, almenkulturelle eller sociale interesser, der er af betydning for den centrale komité's virke. Disse medlemmer må ikke have sæde i kommunale råd eller i Folketinget.

Stk. 4. Komitéen vælger selv sin formand og næstformand blandt de udpegede medlemmer.

Stk. 5. Komitéen udarbejder forslag til vedtægter, der godkendes af forskningsministeren .

Stk. 6. Komitéens medlemmer udpeges for 4 år ad gangen svarende til den amtskommunale valgperiode i Danmark. Genudpegning af medlemmerne kan ske en gang.

§ 5. Den centrale komité skal bl.a. ved fælles møder samarbejde med Det Etiske Råd. Komitéen og rådet udarbejder sammen løbende rapporter om principielle etiske problemstillinger, som har været drøftet i fællesskab.

Kapitel 2

Anmeldelse og tilladelse

§ 6. Ethvert biomedicinsk forskningsprojekt på Færøerne, der indebærer forsøg på

1) levendefødte menneskelige individer,
2) menneskelige kønsceller, der agtes anvendt til befrugtning, menneskelige befrugtede æg, fosteranlæg og fostre,
3) væv, celler og arvebestanddele fra mennesker, fostre og lignende og
4) afdøde,

skal anmeldes til den færøske regionale komité.

Stk. 2. Det samme gælder forskningsprojekter, hvori biomedicinsk forskning som nævnt i stk. 1 udgør en væsentlig bestanddel af det samlede projekt.

Stk. 3. Spørgeskemaundersøgelser og registerforskningsprojekter på Færøerne skal kun anmeldes til den færøske regionale komité, såfremt projektet inde-

holder et væsentligt element af biomedicinsk forskning eller udgør en del af et projekt, som indeholder et væsentligt element af biomedicinsk forskning, og såfremt projektet for den enkelte forsøgsperson indebærer sundhedsmæssige risici eller på anden måde kan være til belastning for den pågældende forsøgsperson.

Stk. 4. Den centrale komité kan fastsætte regler for den praktiske tilrettelæggelse af den videnskabsetiske bedømmelse af projekter, der udføres på flere forskningsinstitutioner (multicenterundersøgelser).

§ 7. Projekter, der er omfattet af § 6, må ikke iværksættes, før der er foretaget en videnskabsetisk bedømmelse heraf og givet tilladelse af den færøske komité til iværksættelsen, jf. § også 14. Den færøske videnskabsetiske komité og den centrale komité kan kræve ændringer i projektet og i øvrigt yde råd og vejledning med hensyn til dettes udformning.

Stk. 2. Projekter, der er tilladt efter stk. 1, må ikke iværksættes og gennemføres med væsentlige ændringer uden komitéens tilladelse.

Stk. 3. Ved projekter, hvori indgår klinisk afprøvning af lægemidler, der er omfattet af lagtingslov om Apoteksvæsenet og lægemidler, afgiver den færøske komité en indstilling om den videnskabsetiske bedømmelse af projektet til Landsapotekeren på Færøerne. Indstillingen skal afgives senest 6 uger efter, at den færøske komité har kunnet foretage bedømmelsen. Landsapotekeren giver den endelige tilladelse til iværksættelsen af projektet.

Stk. 4. Kan der ikke i den færøske komité opnås enighed om bedømmelsen af et projekt, eller finder komitéen, at projektet rejser spørgsmål af principiel karakter, forelægges projektet for den centrale komité, jf. § 11.

Stk. 5. Komitéen skal gøre brug af konsulentbistand i de tilfælde, hvor den ikke selv råder over fornøden faglig ekspertise til at bedømme forelagte projekter.

Kapitel 3

Komitésystemets opgaver

§ 8. I bedømmelsen påser den færøske komité især, at:

1) de risici, der kan være forbundet med at gennemføre projektet, er nøje vurderet og hverken i sig selv eller i forhold til projektets forudselige fordele har et uforsvarligt omfang,

2) de patienter eller raske forsøgspersoner, der deltager i projektet, skriftligt og mundtligt vil blive orienteret om dettes indhold, forudselige risici og fordele, og at deres frie og udtrykkelige samtykke vil blive indhentet og givet skriftligt, jf. dog stk. 3,

3) der i de tilfælde, hvor forsøget udføres under omstændigheder, som udelukker information og indhentelse af samtykke efter nr. 2, vil blive givet information til og indhentet samtykke fra nærmeste pårørende eller en værge, såfremt der er iværksat værgemål efter lov om Umyndighed og Værgemål, der omfatter personlige forhold, herunder beføjelse til at meddele samtykke til deltagelse i biomedicinske forsøg,

4) det klart fremgår af informationen, at patienter og raske forsøgspersoner samt pårørende og værge, der har givet samtykke efter nr. 3, på ethvert tidspunkt kan tilbagekalde sit samtykke,

5) det klart fremgår af den skriftlige information, hvilken økonomisk støtte forskeren modtager fra private virksomheder, fonde m.v. til gennemførelse af det pågældende forskningsprojekt, og om forskeren i øvrigt har en økonomisk tilknytning til private virksomheder, fonde m.v., som har interesser i det pågældende forskningsprojekt, og

6) projektet efter sit formål og med hensyn til sin metodik repræsenterer god videnskabelig standard, samt at der er tilstrækkelig grund til at gennemføre projektet.

Stk. 2. Sundhedsministeren kan fastsætte regler om bestemmelserne i stk. 1, nr. 1-5.

Stk. 3. Komitéen kan i særlige tilfælde bestemme, at registerforskningsprojekter ikke er omfattet af reglen i stk. 1, nr. 2 og 3, om informeret samtykke.

Stk. 4. Komitéen kan afkræve forskeren alle oplysninger, der er nødvendige for bedømmelsen efter stk. 1.

Stk. 5. Såfremt forsøgspersoner modtager vederlag eller anden ydelse for at deltage i forsøget, skal komitéen godkende dette og påse, at det ikke er egnet til at påvirke samtykkeafgivelsen på utilbørlig vis.

Stk. 6. Forskningsministeren kan fastsætte nærmere regler om bestemmelserne i stk. 4.

§ 9. Den færøske komité påser, at projektet udføres i overensstemmelse med den meddelte tilladelse, jf. § 7.

Stk. 2. Komitéen kan følge enkelte projekters forløb og herunder forlange, at den afsluttende forskningsrapport eller publikation sendes til komitéen. Komitéen kan afkræve den projektansvarlige en begrundet redegørelse i tilfælde, hvor projektet ikke fuldføres.

Stk. 3. Den centrale videnskabsetiske komité afgiver hvert år en redegørelse om et eller flere emner i rea-

tion til den færøske og de danske komitéers opfølgning og kontrol med de meddelte tilladelser.
Stk. 4. Emnet eller emnerne for den årlige redegørelse fastlægges efter nærmere aftale med forskningsministeren.

§ 10. Den færøske komité følger løbende udviklingen inden for den biomedicinske forskning og virker inden for deres område for udbredelsen af kendskabet til de etiske problemer, der kan være forbundet hermed.

§ 11. Den centrale komité har til opgave at
1) koordinere arbejdet i de danske regionale komitéer og den færøske regionale komité og fastsætte retningslinier og rådgive disse i videnskabsetiske spørgsmål,
2) følge forskningsudviklingen og virke for forståelsen af de etiske problemstillinger, udviklingen kan medføre i forhold til offentligheden, myndigheder m.v., og
3) behandle forskningsprojekter, som er forelagt komitéen efter § 7, stk. 4, § 12 og § 14.
Stk. 2. Kan der ikke i den centrale komité opnås enighed om bedømmelsen af et projekt, kan komitéen træffe afgørelse ved almindeligt flertal, såfremt flertallet omfatter et flertal blandt såvel medlemmer udpeget efter indstilling fra Statens Sundhedsvidenskabelige Forskningsråd, for den færøske regionale komité's vedkommende: den færøske lægeforening, som blandt andre til Den centrale videnskabsetiske komité udpegede medlemmer, jf. § 4, stk. 2.
Stk. 3. Den centrale komité's afgørelse kan ikke indbringes for anden administrativ myndighed.

§ 12. En forsker, der på Færøerne ikke har fået den færøske regionale komité's tilladelse til at iværksætte et projekt, kan indbringe afgørelsen for den centrale komité. Et projekt kan ligeledes indbringes for den centrale komité af enhver, der har en særlig interesse heri.

§ 13. Den færøske regionale komité og den centrale komité afgiver en årsberetning, der indeholder en redegørelse for komitéernes virksomhed og praksis i det forløbne år. I årsberetningerne beskrives væsentlige videnskabsetiske problemer, komitéerne har drøftet, og der redegøres for begrundelserne for udfaldet af væsentlige sager. Der optrykkes endelig en liste over alle anmeldte projekter.

Kapitel 4
Forskning på befrugtede menneskelige æg og menneskelige kønsceller, der agtes anvendt til befrugtning

§ 14. Biomedicinske forsøg på befrugtede menneskelige æg og kønsceller, der agtes anvendt til befrugtning, må på de i §§ 6-8 nævnte betingelser kun foretages efter tilladelse fra den færøske regionale komité, hvis de har til formål at forbedre in vitro-befrugtning med henblik på at fremkalde en graviditet. Tilsvarende gælder for andre behandlinger for ufrivillig barnløshed, hvor en kvindes æg befrugtes uden for livmoderen.
Stk. 2. Udtagning og befrugtning af æg med henblik på at gennemføre andre forsøg end de i stk. 1 nævnte er ikke tilladt.
Stk. 3. De befrugtede æg må kun holdes i live uden for en kvindes livmoder i 14 dage, fra befrugtningen er sket, heri ikke medregnet den tid, hvori de befrugtede æg har været nedfrosset.
Stk. 4. Befrugtede menneskelige æg, der har været gjort til genstand for biomedicinsk forskning efter stk. 1, må ikke opsættes i kvindens livmoder, medmindre det kan ske uden nogen risiko for videregivelse af arvelige sygdomme, defekter, misdannelser eller lignende.
Stk. 5. Donation af befrugtede menneskelige æg er ikke tilladt.
Stk. 6. Sundhedsministeren bemyndiges til at fastsætte regler om nedfrysning og donation af menneskelige æg.

§ 15. Følgende forsøg må ikke foretages:
1) forsøg, der har til formål at muliggøre fremstilling af arvemæssigt identiske menneskelige individer,
2) forsøg, der har til formål at muliggøre fremstilling af menneskelige individer ved sammensmeltning af genetisk forskellige fosteranlæg eller dele af fosteranlæg, før de sætter sig fast i livmoderen,
3) forsøg, der har til formål at muliggøre fremstilling af levende menneskelige individer, som er hybrider med en arvemasse, hvori indgår bestanddele fra andre arter, og
4) forsøg, der har til formål at muliggøre udvikling af et menneskeligt individ i artsfremmed livmoder.

Kapitel 5
Finansiering

§ 16. Udgifterne til den færøske regionale videnskabsetiske komité afholdes af Landsstyremanden. Til delvis dækning af udgifterne betaler statsinstitu-

tioner samt private firmaer og hospitaler et gebyr pr. projekt til Landsstyremanden. Landsstyremanden fastsætter gebyrets størrelse, som ikke må overstige, hvad der svarer til projektets forventede andel af den pågældende komité's samlede årlige udgift.

Stk. 2. Den centrale komité's udgifter afholdes af forskningsministeren. Ministeren stiller den fornødne sekretariatsbistand til rådighed.

Stk. 3. Medlemmerne af den færøske regionale komité modtager mødegodtgørelser, rejseudgiftsgodtgørelser efter almindelige færøske regler, gældende for tjenestemænd. Landsstyremanden kan beslutte, at medlemmerne herudover ydes diæter efter almindelige færøske regler, gældende for tjenestemænd og erstatning for dokumenteret tabt arbejdsfor tjeneste. Landsstyremanden kan endvidere beslutte, at formanden og næstformanden for den færøske regionale komité får et særligt vederlag for hvervet. En vederlagt formand eller næstformand kan ikke samtidig modtage mødegodtgørelser, rejseudgiftsgodtgørelser, diæter og erstatning for dokumenteret tabt arbejdsfortjeneste.

Landsstyremanden kan beslutte at afholde andre administrative udgifter i forbindelse med den færøske regionale komité.

Stk. 4. Medlemmerne af den centrale komité, bortset fra formanden og næstformanden, ydes diæter, erstatning for dokumenteret tabt arbejdsfortjeneste samt udgiftsgodtgørelse efter reglerne i § 16 a i den danske kommunale styrelseslov. De medlemmer af den centrale komité, der er medlemmer af den færøske komité, ydes mødegodtgørelser, rejseudgiftsgodtgørelser efter almindelige færøske regler, gældende for tjenestemænd.

Stk. 5. Udgiften til vederlæggelse af medlemmerne af den færøske komité og de medlemmer af den centrale komité, der er medlemmer af den færøske komité, afholdes af Landsstyremanden. Udgiften til vederlæggelse af de øvrige medlemmer af den centrale komité samt til fast vederlag til formanden og næstformanden for den centrale komité afholdes af forskningsministeren.

Stk. 6. Sundhedsministeren fastsætter regler om den i stk. 1 nævnte finansieringsordning.

Kapitel 6
Straf

§ 17. Den, der iværksætter et projekt i strid med § 6, § 7, § 14, stk. 2, 3, 4 og 5, og § 15, kan straffes med bøde eller hæfte.

Stk. 2. I forskrifter, der udstedes i medfør af loven, kan der fastsættes straf af bøde.

Stk. 3. For overtrædelser, der begås af et aktieselskab, andelsselskab eller lignende, kan der pålægges selskabet som sådant bødeansvar. Er overtrædelsen begået af Landsstyremanden, en kommune eller et kommunalt fællesskab, jf. Ll. Om de færøske kommuner, kan der pålægges Landsstyremanden, kommunen eller det kommunale fællesskab bødeansvar.

Kapitel 7
Ikrafttræden.

§ 18. Anordningen træder i kraft den 1. august 1998.

Í viðgerð týsdagin 17. mars 1998. Uppskotið varð beint í trivnaðarnevndina.

Málið fall burtur sbr. stýriskipanarlógini § 15 stk. 3, tí at løgtingsval var 30. apríl 1998, og málið ikki var liðugt viðgjørt á tingi fyri valið.

F.L. j.nr. 962-5/91

114 Løgtingslóg um broyting í lóg fyri Føroyar um dagpening vegna sjúku og barnsburð

Ár 1998, hósdagin 5. mars, legði Vilhelm Johannesen, løgtingsmaður, vegna Javnaðarflokkin fram soljóðandi

U p p s k o t
til
løgtingslóg um broyting í lóg fyri Føroyar um dagpening vegna sjúku og barnsburð

§ 1.

Í lóg fyri Føroyar um dagpentng vegna sjúku og barnsburð, jh. lógarkunngerð nr. 102 frá 2. mars 1988 við seinni broytingum, verða gjørdar hesar broytingar:

1) Í §§ 4 og 13 verða orðini "fra 3. hele fraværsdag" broytt til "fra 1. hele fraværsdag".
2) Í § 9, stk. 3 verða orðini "fra og med den 3. fraværsdag" broytt til "fra og med den 1. fraværsdag".
3) Í § 14 verða orðini "efter 1 uges sygdom" strikað.

§ 2.

Hendan lóg fær gildi 1. juli 1998.

Viðmerkingar

Í tingsetuni 1996 legði Javnaðarflokkurin fram uppskot um at seta úr gildi lógina um avmarking í løn í sambandi við sjúku. Í viðmerkingunum til tað málið segði flokkurin, at hann í hesi tingsetuni fór at leggja fram uppskot um at broyta lógina um dagpening soleiðis, at sjúkradagpeningur verður veittur frá fyrsta degi.

Uppskotið um at seta úr gildi lógina um avmarking í løn í sambandi við sjúku vann ikki fruma í seinastu tingsetu, men hevur Javnaðarflokkurin nú lagt uppskotið fram av nýggjum í teirri vón, at tað fær undirtøku á hesum sinni. Endamálið við hesum uppskotinum er at javnseta tímalønt, útróðramenn og onnur, sum fáa dagpentng undir sjúku, við tey, ið fáa fasta løn undir sjúku. Annars verður vist til viðmerkingarnar til uppskotið um avtøku av sonevndu karensdøgunum.

Tá vit rokna við, at Dagpeningaskipanin skal nýta nakað av tí til fyrireiking í sambandi við broytingina, verður skotið upp, at broytingin fær gildi frá 1. juli 1998. Meirútreiðslan av broytingini verður mett til umleið 1,6 miltiónir krónur um árið. Í 1998 snýr tað seg um eitt hálvt ár. Í uppskoti til eykajáttanarlóg, ið verður lagt fyri tingið samstundis, sum hetta málið verður framlagt, mæla vit til, at játtanin til dagpening verður hækkað við 1 miltión krónum.

At enda vil javnaðarflokkurin mæla til, at hetta uppskotið og uppskotið um at seta úr gildi lógina um avmarking í løn í sambandi við sjúku, verða viðgjørd undir einum.

1. viðgerð týsdagin 17. mars 1998. Uppskotið vard beint í trivnaðarnevndina.

Málið fall burtur sbr. stýriskipanarlógini § 15 stk. 3, tí at løgtingsval var 30. apríl 1998, og málið ikki var liðugt viðgjørt á tingi fyri valið.

115 Broyting í løgtingslóg um viðbót til ávísar pensjonistar

Á 1998, hósdagin 5. mars, legði Vilhelm Johannesen, løgtingsmaður, vegna Javnaðarflokkin fram soljóðandi

U p p s k o t
til
løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um viðbót til ávísar pensionistar

§ 1.

Í løgtingslóg nr. 35 frá 16. apríl 1997 um viðbót til ávísar pensionistar verður gjørd hendan broyting:

§ 1, stk. 2 verður orðað soleiðis: "Viðbótaruppheddin verður kr. 6.000,00 um árið til hvønn móttakara. Landsstýrismaðurin í almannamálum ásetir nærri reglur um útgjadding av upphæddini."

§ 2.

Hendan lóg kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

Viðmerkingar
Endamálið við hjálagda uppskoti er at bøta um støðuna hjá teimum pensjonistum, sum eru ringast fyri, við tað at teir bert fáa fólkapensjónina og tær 525 kr. úr Arbeiðsmarknaðareftirlønargrunninum (Samhaldsfasta) um mánaðin.

Støðan er tann, at nøkur, umframt fólkapensjónina, hava eina tænastumannapensjón, at onnur fáa krígspensión og uppaftur onnur fáa eina eftirløn, sum antin tey sjálvi við eini kapitaluppsparing hava teknað, ella sum teirra løntakarafelag hevur fingið í lag.

Við løgtingslóg nr. 51 frá 12. mai 1995 varð fyrstu ferð samtykt at veita fólka-, avlatnis- og einkju-pensjonistum ein brennistuðul. Frá 1980 til 1987 varð stuðulin nevndur brennistudningur, men hetta varð frá 1988 til 1994 broytt til brenni- og samskiftisstudning. Frá 1995 varð stuðulin nevndur viðbót til ávísar pensjonistar.

Frá 1980 til 1987 var stuðulin ætlaður sum ískoyti til oljugjald, og frá 1988 til 1994 var stuðulin ætlaður sum ískoyti til olju-, sjónvarps- og útvarpsgjald. Síðan 1995 er stuðulin ætlaður sum eitt meiri alment ískoyti til pensjónina hjá teimum pensjonistum, sum eru ringast fyri og einki annað fáa uttan fólkapensjónina og gjaldtíð úr Arbeiðsmarknaðareftirlønargrunninum.

Eftir galdandi lóg verður viðbótin ásett í roun til játtanina á fíggjarlógini. Tað v. s., at talið av ávísum pensjonistum og játtanin á fíggjarlógini er avgerandi fyri, hvussu stór upphæddin verður til tann einstaka móttakaran. Á verandi fíggjarlóg er játtanin 12,2 miltiónir krónir. Í 1996 var talið av ávísum pensjonistum, sum fáa hesa viðbót, 3.837. Í 1997 var útgjaldið kr. 3.240,00 til hvønn móttakara.

Í hjálagda uppskoti verður mælt til, at upphæddin til tann einstaka móttakaran verður ásett í sjálvari lógini, og at hendan verður ásett til kr. 6.000,00 um árið. Meirkostnaðurin av hesum verður 11,2 miltiónir krónir í 1998. Í uppskoti til eykajáttanarlóg mælir Javnaðarflokkurin til, at játtanin á fíggjarløgtingslógini fyri 1998 verður hækkað við 11,2 miltiónum krónum.

1. viðgerð týsdagin 17. mars 1998. Uppskotið varð beint í trivnaðarnevndina.

Málið fall burtur sbr. stýrisskipanarlógini § 15 stk. 3, tí at løgtingsvalið var 30. apríl 1998, og málið ikki var liðugt viðgjørt á tingi fyri valið.

116 Uppskot til løgtingslóg um skyldu abreiðsgevaranna at boða løntakarunum frá um setanartreytir teirra

Ár 1998, hósdagin 5. mars, legði Ingeborg Vinther, løgtingsmaður, vegna Verkamannafylkingina fram soljóðandi:

U p p s k o t
til
løgtingslóg um skyldu arbeiðsgevaranna at boða løntakarunum frá um setanartreytir teirra

Lógarinnar øki

§ 1. Henda lóg er galdandi fyri allar løntakarar, sum settir eru í starv fyri tíðarskeið, sum er meira enn 1 mánað, og har miðalarbeiðstíðin um vikuna er meira enn 8 tímar. Lógin er ikki galdandi fyri fólk, sum eru fevnd av sjómannslógini.

Stk. 2. Sum løntakari er at skilja persónur, sum fær samsýning fyri persónligt arbeiði í tænastuviðurskiftum.

Stk. 3. Lógin er ikki galdandi í tí føri, har arbeiðsgevarin sambært høvuðssáttmála ella sersáttmála hevur skyldu til at geva løntakarunum fráboðan í ein mun, sum ikki víkir frá lógarinnar kravi.

Stk. 4. Rættindini hjá løntakarunum sambært hesari lóg kunnu ikki skerjast við avtalu.

Stk. 5. Føroya landsstýri kann áseta, at løntakari, sum bert stundum hevur arbeiði ella hevur serligt arbeiði, ikki skal verða fevndur av lógini.

Upplýsingarskylda arbeiðsgevarans

§ 2. Arbeiðsgevarin skal í seinasta lagi ein mánað eftir, at viðkomandi løntakart er komin í starv, geva løntakaranum upplýsingar um viðurskifti, sum eru nevnd í stk. 2 nr. 1-10. Um løntakari ikki við starvssetan hevur eina miðalarbeiðstíð, sum er meira enn 8 tímar um vikuna, kemur arbeiðsgevarans upplýsingarskylda í gildi, tá løntakarin tær seinastu 4 vikurnar hevur havt eina miðalarbeiðstíð um vikuna, sum er meira enn 8 tímar.

Stk. 2. Arbeiðsgevarans upplýsingarskylda fevnir um hesar upplýsingar:

1. Navn arbeiðsgevarans og løntakarans,
2. upplýsingar um, hvar arbeiðsstaðið er ella, um talan ikki er um fast arbeiðsstað, so upplýsingar um, hvar meginparturin av arbeiðnum verður gjørdur, og upplýsingar um at løntakarin møguliga er starvsettur á ymiskum støðum, umframt høvuðsskrivstovuni hjá arbeiðsgevaranum og hústaði hansara,
3. frágreiðing um arbeiði og starvsbeiti løntakarans,
4. nær starvssetanin tók við,
5. hvussu leingi arbeiðið væntandi kemur at vara, um talan er um tíðaravmarkað arbeiði,
6. rættindi løntakaranna viðvíkjandi frítíð við løn og frítíðarfskoyti,
7. uppsagnarfreistirnar, sum galdandi eru fyri ávikavist arbeiðsgevara og løntakaran,
8. tann sáttmálaavtalaða ella nillum partanna avtalaða løn, sum løntakarin hevur rætt til, tá starvssetanin byrjar, umframt fskoyti, sum ikki er beinleiðis partur av lønini, t.d. eftirlønargjøld o.a. Harumframt skal arbeiðsgevarin upplýsa, nær lønin verður útgoldin,
9. vanligu arbeiðstíðina hvønn dag ella hvørja viku,
10. upplýsingar um hvørjar høvuðsavtalur ella avtalur annars eru galdandi fyri starvssetanina. Um talan er um sáttmálar ella avtalur, sum eru gjørdar av pørtum uttan fyri sjálvt virkið, skal arbeiðsgevarin eisini upplýsa, hvørjir hesir partar eru.

Stk. 3. Upplýsingarnar kunnu verða givnar í hesum skjølum:

1. einari skrivligari váttan, sum hevur allar tær í stk. 2 nr. 1-10 viðmerktu upplýsingar, burtursæð frá teimum upplýsingum, sum møguliga eru givnar í einum av niðanfyri í nr. 2-4 nevndu skjølum,
2. einari skrivligari arbeiðsavtalu,
3. einum setanarskrivi, ella
4. einum ella fleiri skjølum undir tí fyritreyt, at í minsta lagi eitt av hesum skjølum hevur allar tær upplýsingar, sum nevndar í stk. 2 , nr. 1-4, 8 og 9.

Stk. 4. Viðvíkjandi teimum upplýsingum, sum nevndar eru í stk. 2, nr. 6-9, verður upplýsingarskyldan mett at vera lokin, um so er, at tað í skjølunum, sum eru nevnd í stk. 3, verður víst til lógir, fyrisitingarligar avgerðir, reglur í viðtøkum ella høvuðsavtalum, sum galdandi eru fyri viðkomandi starvssetanarviðurskifti.

Skipan í starv uttanlands

§ 3. Um so er, at løntakari skal gera arbeiði í einum ella fleiri øðrum londum í meira enn ein mánað, skulu tey í § 2, stk. 3 nevndu skjøl vera løntakaranum í hendi, áðrenn hann fer avstað. Umframt tær upplýsingar, sum nevndar eru í § 2, stk. 2, skal skjaliðvskjølini hava hesar upplýsingar:

1. Tíðarskeiðið, har arbeiðið verður gjørt uttanlands,
2. í hvørjum gjaldoyra lønin verður útgoldin,
3. møguligir fyrimunir í peningi ella á annan hátt, sum eru ein liður í uppihaldinum uttanlands,
4. treytirnar í sambandi við, at løntakarin kemur heimaftur,5. um arbeiðsgevarin hevur tikið stig til at fáa neyðugar váttanir í sambandi við arbeiði uttanlands.

Stk. 2. Viðvíkjandi teimum upplýsingum, sum nevndar eru í stk. 1, nr. 2 og 3, kunnu hesar upplýsingar verða givnar í tí ella teimum í § 2, stk. 3, nevndu skjølum vísandi til lógir, umsitingarligar avgerðir.

ásetingar í viðtøkum ella høvuðsavtalum, sum galdandi eru fyri hesi arbeiðsviðurskifti.

Broyting av setanarviðurskiftum

§ 4. Arbeiðsgevarin skal í sambandi við allar broytingar av teimum í § 2 stk. 2 og § 3, stk. 1, nevndu viðurskiftum skjótast møguligt og í seinasta lagi ein mánað aftan á tann dag, broytingin kemur í gildi, geva løntakarunum skrivliga fráboðan um hesar broytingar. Hetta er kortini ikki galdandi, um broyting er orsakað av broytingum í lógum, umsitingarligum avgerðum, broytingum í viðtøkum ella høvuðssáttmálum, sum arbeiðsgevarin sambært § 2, stk. 4, ella § 3, stk. 2, kann vísa til.

Avleiðing av at arbeiðsgevarin ikki heldur upplýsiuugarskyldu sína

§ 5. Spurningurin um, í hvønn mun arbeiðsgevarin hevur hildið sína upplýsingarskyldu eftir lógini, verður avgjørdur av tí gerðarrætti, sum hevur heimild at tulka teir sáttmálar, sum galdandi eru fyri viðkomandi arbeiðsøki.

Stk. 2. Um arbeiðsgevarin ikki hevur hildið sína upplýsingarskyldu, kann gerðarrætturin døma arbeiðsgevaran at gjalda løntakarunum eina samsýning, sum í mesta lagi kann svara til 2 mánaðarlønir.

Gildiskoma

§ 7. Lógin kemur í gildi dagin eftir, at hon er lýst, og er galdandi fyri avtalur um starvssetanir, sum eru gjørdar henda dag ella seinni.

Almennar viðmerkingar

Í flestu grannalondum okkara eru galdandi lógir, sum á ymsan hátt verja løntakararnar í sambandi við starvssetan teirra.

Lóggávuvaldið í hesum londum hevur mett, tað vera tørv á slíkum reglum, og undirritaðu uppskotsstillarar halda, at tørvurin á slíkum verndarreglum er tilnýst líka stórur í Føroyum sum í grannalondum okkara.

Vit halda, tað vera náttúrligt, at arbeiðsgevarin skal hava skyldu til at geva løntakarunum ymsar upplýsingar, sum hava atlit til starvssetan hansara.

Fíggjarligar avleiðingar av lógaruppskotinum

Tað almenna fer ikki at hava útreiðslur í sambandi við, at lógin verður sett í gildi.

Viðmerkingar til tær einstøku lógargreinarnar

Viðv. § 1:

Eftir uppskotinum skal lógin verða galdandi fyri bæði løntakarar, sum eru settir í starv hjá tí almenna og á tí privata arbeiðsmarknaðinum.

Mett verður ikki, at neyðugt er, at lógin skal verða galdandi fyri persónar, sum eru fevndir av sjómannslógini, tí henda lóg hevur ymsar ásetingar, sum líkjast ásetingunum í hesum lógaruppskoti.

Í stk.2 verður hugtakið løntakari staðfest.

Í stk.4 verður áset, at lógin er eitt minstamark, skilt á tann hátt, at møguligt avtala millum løntakara og arbeiðsgevara ella feløg teirra um, at arbeiðsgevarin ikki skal hava tær skyldur, sum lógin ásetir, eru ógildugar.

Viðv. § 2:

Í stk. 1 verður áset, nær arbeiðsgevarin skal láta løntakaranum tær upplýsingar, sum lógin ásetir.

Í stk. 2 er yvirlit yvir tær upplýsingar, sum arbeiðsgevarin skal láta løntakaranum.

Í stk. 3 og 4 verður nærri tilskilað, hvussu arbeiðsgevarin kann láta løntakaranum tær upplýsingar, sum nevndar eru í stk. 2.

Viðv. § 3:
Henda lógargrein ásetir reglurnar, tá talan er um arbeiði uttanlands.

Í slíkum førum er tørvur á øðrum upplýstingum, sum skulu latast afturat teimum upplýstingum, sum nevndar eru í § 2, stk. 2.

Viðv. § 4:
Í hesari lógargrein verður ásett, hvørjar skyldur arbeiðsgevarin hevur, tá talan er um broytingar av viðurskiftum, sum nevnd eru í § 2, stk. 2 og § 3, stk. 1.

Um so er, at talan er um broytingar, sum eru grundaðar á lógarbroytingar ella broytingar í umstingarligum ásetingum, viðtøkubroytingum ella høvuðssáttmálum, so verður arbeiðsgevarin mettur at hava lokið skyldur sínar, um hann vísir tilfarið, sum nevnt er í § 2, stk. 4, ella § 3, stk. 2.

Viðv. § 5:
Vit hava mett, tað vera náttúrligt, at tað er gerðarmenturin, sum hevur heimild at tulka sáttmálar á tí ávísa økinum, sum skal hava heimild at taka støðu til, um arbeiðsgevarin hevur hildið sína upplýsingarskyldu ella ikki.
Í donsku lógini er tað "arbejdsmarkedets uoksnævn", sum hevur hesar heimildir, men vit meta, tað ikki vera ráðiligt, at slíkur kærustovnur verður settur á stovn.

Viðv. § 6:
Sum í grannalondum okkara, so halda vit, tað er rætt, at løntakari skal hava møguleika fyri at fáa samsýning frá arbeiðsgevaranum, um hesin ikki heldur upplýsingarskyldu sína.

Vit hava mett, tað vera hóskandi, at hendan samsýning í mesta lagi skal svara til 2 mánaðarlønir.

Viðv. § 7:
Vit meta, tað vera rætt, at ásett verður í lógini, frá hvørjum degi starvssetanaravtalur koma undir lógina.

1. viðgerð týsdagin 17. mars 1998. Uppskoðað verð beint í tríggjarnevndina.

Málið fall burtur sbr. stýrisskipanarlógini § 15 stk. 3, tí at løgtingsval var 30. apríl 1998, og málið ikki var liðugt viðgjørt á tingi fyri valið.

117 Uppskot til løgtingslóg um fyrireiking av at kanna viðurskiftini hjá pensjónistum og eldri

Ár 1998, hósdagin 5. mars, legði Lasse Klein, løgtingsmaður, vegna Kristiligu Fólkaflokkin, Føroyar Frambjóðs- og Fiskivinnuflokk fram soljóðandi

Uppskot
til
løgtingslóg um fyrireiking av at kanna viðurskiftini hjá pensjonistum og eldri

§ 1. Landsstýrið fær heimild at seta nevnd niður at kanna øll viðurskifti hjá pensjonistum og eldri.

§ 2. Landsstýrið fær heimild at seta nevnd at viðgera pensjonistaviðurskiftini og viðurskiftini hjá teimum eldru í Føroyum.

§ 3. Pensjonistanevndin skal hava 9 limir, sum landsstýrið velur:
Stk. 2. Í nevndini skulu sita:
2 umboð fyri pensjonistafelagini
2 umboð fyri felagini
2 umboð fyri landsstýrið

í umboð fyri kommununar
1 búskaparfrøðingur
1 løgfrøðingur
Stk. 3. Nevndin skipar seg sjálv við formanni og næstformanni.

§ 4. Arbeiðsseting**u**rin hjá pensjonistanevndini er:
1) at kanna umstøðurnar hjá pensjonistum og eldri í Føroyum, eisini í mun til umstøðurnar í øðrum londum,
2) at kanna livikorini hjá pensjonistum og eldri í Føroyum, og í mun til umstøðurnar aðrastaðni,
3) at gera tilmæli um íbúðarviðurskifti teirra,
4) at gera tilmæli um ein almennan pensjonista- og eldrapolitikk í Føroyum,
5) at gera uppskot til løgtingslóg, sum fevnir um m.a. hesi viðurskifti hjá pensjonistum og eldri:
viðurskiftini hjá teimum eldru á arbeiðsmarknaðinum,
íbúðarviðurskifti teirra,
skatta- og avgjaldsviðurskiftir,
hjálpitólaamboð,
pensjónsupphæddir,
pensjónsviðbøtur,
lívsgrundarlag teirra,
rætt til almennar tænastur, og frádráttir í almennum gjøldum, so sum: telefon, oljuavgjald, el, útvarps- og sjónvarpsgjald o.s.fr.

Stk. 2. Nevndin hevur haraftrat heimild at viðgera allar spurningar hjá pensjonistum og og eldri, sum nevndin heldur hava týdning.

§ 5. Nevndin skal seta skrivara. Hesin skal vera løgfrøðingur ella hava aðra samfelagsvirkisliga útbúgving, sum gevur yrkisligan førleika at útinna hetta starv.
Stk. 2. Skrivarin kann eftir avtalu við nevndarformannin taka sær lønta hjálp.
Stk. 3. Nevndarlimir, skrivarin, og hjálpari hansara, verða løntir eftir nærri avtalu við landsstýrið.
Stk. 4. Nevndin fær við hesi løgtingslóg heimild til at nýta pening til útreiðslur nevndarinnar, tó í mesta lagi 550.000 kr.

§ 6. Nevndin skal enda arbeiði síit við áltti og uppskotum í seinasta lagi á ólavsøku 1999.

§ 7. Lógin fær gildi dagin eftir, at løgtingslógin er kunngjørd, og fer úr gildi, tá ið álit og uppskot nevndarinnar er liðugt.

Almennar viðmerkingar
Nú uppskotið um sostalar pensjónir o.a. er lagt fram og er til viðgerðar í Trivnaðarnevndini, er tíðin komin til at samskipa alla viðgerðina av korunum hjá pensjonistunum og teimum eldru, og at skipað ein meira ágreiniligan pensjonista- og eldrapolitikk í Føroyum í síni heild.

Málið um viðurskiftini hjá pensjonistum og eldri fólkum í Føroyum hevur fleiri ferðir verið umrøtt á tingi, men kortini ikki sum samskipað orðaskifti um kor teirra í samfelagnum.

Hetta er orsøkin til, at gingið verður eitt stig longur í at samskipa viðgerðina.

Pensjonistarnir í Føroyum hava merkt ta darvandi fíggjarligu gongdina sum ein støðugt vaksandi trupulleika í gerandisdegnum, og hava teir saman við øðrum samfelagsbólkum upplivað niðurskurð og øktar útreiðslur.

Ásannað er frá føroyskari síðu, at tá ið vit samanbera fíggjarligu støðuna hjá pensjonistum her á landi við aðrar danskar ríkisborgarar, verður komið til eitt sjónligt verri fíggjarligt úrslit, bæði tá hugt verður eftir teimum almennu veitingunum, og tá hugt verður eftir føstum útreiðslum.

Íbúðarmynstrið er so háttað, at nógvir pensjonistar búgva í egnum húsi, ið er goldið, men hevur tørv á stórum viðlíkahaldi, sum kann gerast ein stór eingangsútgerð, og alt ov nógv rørslubrekað gomul búgva í ov vánaligum íbúðum.

Ógvuliga fá gomul fólk og pensjonistar í Føroyum, sum búgva í egnum húsum, hjálpast bert við vanligu fólkapensjónini.

Tørvur á viðgerð av hesum viðurskiftum og at betra um umstøðurnar hjá teimum er stórur, og tí hevur tað skund, at viðurskiftini hjá pensjonistunum og eldri í Føroyum verður tikin upp til politiska viðgerð.

Til tess at fremja skjóta politiska viðgerð, er neyðugt, at eitt ávíst arbeiði fer fram á hesum øki, sum týsir korini hjá teimum, og at lógaruppskot verða gjørd. Kristiligi Fólkaflokkurin heldur, at rættast er, at landsstýrið setir nevnd at taka sær av nevnda arbeiði. Nevndin eigur at vera mannað við 9 limum.

Nevndin skal seta skrivara, ið er løgfrøðingur ella hevur aðra samfelagsyrkisliga útbúgving, sum gevur yrkisligan førleika at útinna hetta starv.

Skrivarin kann eftir avtalu við nevndarformannin taka sær løntan hjálpara. Ilt er at meta um kostnaðin av nevnda arbeiði, men verður skotið upp at nýta í mesta lagi kr. 550.000 til endamálið.

Tilfkt arbeiði er stórt og umfatandi, tí eigur nevndin at fáa rímiliga tíð at viðgera málið.

Skotið verður upp at leggja álitið fram á ólavsøku 1999.

1. viðgerð týsdagin 17. mars 1998. Uppskotið varð beint í trivnaðarnevndina.

Málið fall burtur sbr. stýrisskipanarlógini § 15 stk. 3, tí at løgtingsval var 30. apríl 1998, og málið ikki var tíðugt viðgjørt á tingi fyri valið.

118 Uppskot til løgtingslóg um fráboðan í sambandi við hópuppsagnir

Ár 1998, hósdagin 5. mars, legði Ingeborg Vinther, løgtingsmaður, vegna Verkamannafylkingina fram soljóðandi

Uppskot
til
løgtingslóg um fráboðan í sambandi við hópuppsagnir

Kapitul 1
Øki lógarinnar

§ 1. Lógin er galdandi í sambandi við uppsagnir, sum arbeiðsgevari hevur ætlanir um at fremja av einari ella fleiri orsøkum, sum løntakarin ikki hevur ábyrgdina av, tá talið á teimum, sum ætlanin er at siga upp innan fyri eitt tíðarskeið sum 30 dagar ella minni, eru:

1. í minsta lagi 3 persónar í virkjum, har vanliga eru starvssett millum 5 og 10 persónar,
2. minst 4 persónar í virkjum, har vanliga eru starvssett millum 10 og 20 løntakarar,
3. minst 5 persónar í virkjum, har vanliga eru starvssett meira enn 30 persónar.

Stk. 2. Í sambandi við uppgerðina av uppsagnum sambært stk. 1, verður tikið við uppat hald av starvssetanarviðurskiftum, sum løntakarin ikki hevur ábyrgdina av, m.a. tá løntakarin sjálvur sigur upp orsakað av, at arbeiðsgevarin hevur givið tilsøgn um serliga góðar uppsagnartreytir.

Stk. 3. Lógin er galdandi uttan mun til, um avgerðin um uppsagnir er tikin av arbeiðsgevaranum sjálvum ella av einum virki við avgerandi ávirkan, sum arbeiðsgevarin er ein partur av.

Stk. 4. Lógin er ikki galdandi fyri:

1. uppsagnir, sum verða gjørdar innan karmarnar av avtalum um arbeiði, sum eru gjørd fyri ávíst tíðarskeið ella fyri ávísa arbeiðsuppgávu, um hesar uppsagnir ikki verða gjørdar, áðrenn hesar avtalur eru úti ella eru loknar,
2. uppsagnir av sjómonnum á havgangandi skipum.

Stk. 5. Lógin er ikki galdandi í teimum førum, har arbeiðsgevarin sambæri høvuðssáttmála hevur samsvarandi skyldur, sum eftir §§ 7, 8 og 10.

Stk. 6. § 8 og 10 eru ikki galdandi fyri uppsagnir av løntakarum, sum ávirkaðir verða av, at virkið steðgar virksemi sínum grundað á rættarúrskurð.

Stk. 7. Ásetingarnar í § 6, stk. 2, og § 7 um skyldu at geva felløgunum fráboðan um ætlaðar uppsagnir

eru ikki galdandi fyri uppsagnir av løntakarum, sum verða ávirkaðir av, at virkið steðgar virksemi sínum grundað á rættarúrskurð.

§ 2. Við eitt arbeiðspláss sambært § 10 er at skilja ein eind av arbeiðsgevarans virki, har ein ella fleiri av løntakarunum í virkinum arbeiða. Har eitt virki hevur fleiri arbeiðspláss í sonu kommunu, verða arbeiðsplássini at meta sum eitt arbeiðspláss.

§ 3. Lógin ger ongar broytingar í teimum ásetingum um uppsagnarfreistir, sum ásettar eru í lóg, høvuðssáttmála ella setanaravtalu.
Stk. 2. Lógin viðvíkir ikki teimum arbeiðsrættarligu reglum, sum galdandi eru í sambandi við faklig tiltøk á arbeiðsmarknaðinum.

§ 4. Føroya landsstýri kann áseta nærri reglur fyri uppgerðini av talinum á løntakarum sambært § 1, stk. 1, og tey atlit, sum skulu verða í sambandi við avgerðina, um talan er um eitt virki sambært hesari lóg.

Kapitul 2
Samráðingarskylda

§ 5. Um arbeiðsgevari hevur ætlanir um at fremja uppsagnir, sum fevndar eru av § 1, skal arbeiðsgevarin so skjótt sum gjørligt taka upp samráðingar við løntakaramar á virkinum ella álitisfólkini, um so er, at slík álitisfólk eru vald á arbeiðsplássinum. Løntakarin ella álitisfólkini kunnu undir samráðingunum hava umboð fyri fakfelagið ella persón við serligum sakkunnleika við sær til samráðingarnar.
Stk. 2. Endamálið við samráðingunum er at fáa í lag avtalu um at sleppa undan ella avmarka tær ætlaðu uppsagnirnar og bøta um fylgjurnar av hesum uppsagnum við at fáa til vega onnur størv ella endurútbúgving til teir løntakarar, sum verða uppsagdir.

§ 6. Arbeiðsgevarin skal í sambandi við samráðingarnar eftir § 5 geva løttakarunum á virkinum ella álitisfólkunum allar upplýsingar, sum kunnu hava týdning fyri málið, og í minsta lagi geva skrivliga fráboðan um:

1. grundirnar til ætlaðu uppsagnirnar,
2. talið á løntakarunum, sum eftir ætlan skulu verða sagdir upp, hvørt arbeiðsøki hesir hoyra til, og tað tíðarskeið, sum uppsøgnin ætlandi skal fara fram,
3. talið á løntakarum, sum vanliga arbeiða á virkinum, og hvønn starvsbólk hesi hoyra til,
4. hvørt metingarstøði, ætlanin er at brúka í sambandi við, at arbeiðsgevarin velur út teir løntakarar, sum eftir ætlan skulu sigast upp, um arbeiðsgevarin ikki sambært lóg ella siðvenju hevur rættindini til at velja metingarstøðið í sambandi við uppsøgn,
5. um einstakir av teimum løntakarum, sum eftir ætlan skulu sigast upp, hava rætt til serligar samsýningar í sambandi við uppsøgn eftir høvuðsavtalu ella setanarskrivi, og hvussu hendan samsýning verður gjørd upp.

Stk. 2. Arbeiðsgevarin skal samstundis, sum tann í stk. 1, nevnda fráboðan verður latin, senda avrit til avvarandi fakfeløg.

Kapitul 3
Fráboðan um uppsøgn

§ 7. Um arbeiðsgevarin, eftir at hava samráðst sambært reglunum í § 5 og 6, framhaldandi hevur ætlanir um at fremja uppsagnirnar, sum fevndar eru av § 1, skal arbeiðsgevarin senda viðkomandi fakfelag fráboðan um hesar ætlaðu uppsagnir. Slík fráboðan skal sendast í fyrsta lagi 21 dagar eftir, at samráðingar eru tiknar upp sambært § 5, um annað ikki er nevnt í høvuðssáttmála.
Stk. 2. Fráboðan sambært stk. 1 skal hava allar upplýsingar, sum hava týdning fyri viðgerðina av málinum um ætlaðu uppsagnirnar, og um tær í § 5 nevndu samráðingar, serliga orsøkirnar til uppsagnirnar, talið á løntakarum, sum vanliga arbeiða á virkinum, og tað tíðarskeið, sum uppsagnirnar ætlandi skulu fara fram.
Stk. 3. Arbeiðsgevarin skal skjótast tilber og í seinasta lagi 10 dagar eftir, at fráboðanin sambært stk. 1 er send, geva avvarðandi fakfelag fráboðan um, hvørjir persónar verða uppsagdir. Hesir persónar skulu í seinasta lagi samstundis hava fráboðan um uppsagnirnar.
Stk. 4. Arbeiðsgevarin skal skjótast tilber geva avvarðandi fakfelag fráboðan um endaligu úrslitið av samráðingunum, sum nevndar eru í § 5.
Stk. 5. Arbeiðsgevarin skal samstundis við fráboðanini sambært stk. 1 og stk. 4 senda avrit til allar løntakaramar á virkinum ella álitisfólki teirra, um so er, at slíkt álitisfólk er valt.
Stk. 6. Hesi starvsfólk kunnu senda nøgdligar viðmerkingar til avvarðandi fakfelag. Avrit av hesari fráboðan til fakfelagið verður sent arbeiðsgevaranum.

§ 8. Uppsagnir, sum fráboðan er givin um sambært

§ 7, stk. 1, fáa í fyrsta lagi gildi 30 dagar eftir, at fráboðan er send til avvarðandi fakfelag, um lóg ella sáttmáli ikki geva løntakaranum longri uppsagnarfreist.

Kapitul 4
Tagnarskylda

§ 9. Løntakaramir á virkinum ella álitisfólkið og tey í § 5, stk. 1, nevndu umboð fyri fakfelagið ella persónar við serligum sakkunnleika, umframt arbeiðsgevarin og hansara umboð, hava ikki rætt til at geva víðari upplýsingar, sum sambært lógini eru givnar í trúnaði.

Kapitul 5
Samsyning

§ 10. Arbeiðsgevari, sum í sambandi við uppsagnir, sum fevndar eru av § 1, ikki tekur upp samráðingar við løntakaran eftir § 5, ella ikki sendir inn fráboðan til avvarðandi fakfelag eftir § 7, skal gjalda viðkomandi løntakara samsyning. Hendan samsýning er fyri hvønn løntakara ein upphædd, sum svarar til 30 daga løn frá uppsagnardegnum at rokna, umframt vanligu uppsagnarløninа.

Stk. 2. Har talið á uppsagnum er minst 50% av løntakarunum á einum arbeiðsplássi sambært § 2, og talan er um arbeiðspláss, har vanliga meira enn 20 fólk starvast, skal samsyningin, sum nevnd er í stk. 1, fyri hvønn luttakara vera ein upphædd, sum svarar til løn í 4 vikur frá uppsagnardegnum at rokna, umframt vanligu uppsagnarløninа.

Kapitul 6
Revsireglur

§ 11. Hann, sum ger brot á reglurnar í § 5, 6 og 7, verður sektaður við bót.

Stk. 2. Um lógarbrotið er framt av einum felag, sjálvstýrandi stovni ella tílíkum felagsskapi, kann sektin áleggjast sjálvum løgfrøðiliga persóninum. Um ein kommuna ella kommunalt felag hevur framt lógarbrotið, kann bótin áleggjast kommununi ella kommunala felagnum.

Kapitul 7
Gildiskoma

§ 12. Lógin kemur í gildi dagin eftir, at hon er lýst, og er galdandi fyri uppsagnir, sum ikki endaliga eru fráboðaðar løntakarunum hendan dag.

Almennar viðmerkingar

Í grannalondum okkara eru galdandi ymsar lógarásetingar, sum verja løntakaran, serliga í sambandi við uppsagnir.

M.a. eru í grannalondum okkara galdandi lógir, sum fyriskriva mannagongdina, tá talan er um hópuppsagnir.

Við teimum sera álvarsligu avleiðingum, sum slíkar uppsagnir vanliga kunnu hava, og sum ikki eru óketdar her heima í Føroyum í fyrru helvt av nítiárunum, meta vit tørv vera á reglum, sum verja løntakaran í sambandi við slíkar hópuppsagnir.

Við støði í teimum reglum, sum galdandi eru í grannalondum okkara, hava vit orðað hjálagda lógaruppskot, sum áleggur arbeiðsgevaranum skyldu til at boða frá hópuppsagnum í góðari tíð, umframt at arbeiðsgevarin skal hava skyldu til at taka upp samráðingar við løntakaran, tá ætlanin er at seta slíkar hópuppsagnir í verk.

Eisini skal arbeiðsgevarin sambært lógaruppskotinum boða avvarðandi løntakarafelag frá, tá ætlanin er at fremja slíkar uppsagnir.

Vit vísa annars til viðmerkingarnar til tær einstøku lógargreinirnar.

Fíggjarligar avleiðingar av lógaruppskotinum

Ilt er at meta um, hvørjar fíggjarligar avleiðingar hetta lógaruppskot kann fara at hava fyri tað almenna, tí um tað almenna ikki fremur hópuppsagnir, sum fevndar eru av § 1 í lógaruppskotinum, so kemur hetta ongar fíggjarligar avleiðingar at hava fyri tað almenna, so almennu myndugleikarnir ráða sjálvir fyri, um teir koma at hava útreiðslur av hesar lóg ella ikki.

Viðmerkingar til tær einstøku lógargreinirnar
Viðv. § 1:
Í hesari lógargrein verður ásett, í hvørjum føri uppsagnir koma undir lógarinnar øki.

Í stk. 2 verður ásett, at um arbeiðsgevarin við serliga góðum uppsagnartreytum fær løntakara at siga upp, so skal hesin løntakari teljast við, tá roknað verður út, um uppsagnirnar innan fyri tað tíðarskeið, sum nevnt er í stk. 1, skulu koma inn undir lógarinnar øki.

Í stk. 3 er ásett, at um talan er um dótturfelag, so skal hetta dótturfelag ikki kunna skjóta seg inn undir, at tað er móðurfelagið, sum hevur álagt dótturfelagnum at fremja uppsagnirnar, og soleiðis sleppa undan at koma inn undir øki lógarinnar.

Í stk. 4 er ásett, at tá talan er um avmarkaða starvssetan ella ávísa serliga arbeiðsuppgávu, ella tá talan er um sjómenn, so er lógin ikki galdandi.

Vit skulu her viðmerkja, at sjómenn koma undir reglurnar í sjómanslógini.

Í stk. 5 verður ásett, at um høvuðssáttmáli áleggur arbeiðsgevara sonn skyldur, sum lógin ásetir, so er lógin ikki galdandi fyri hesi viðurskiftir.

Í stk. 6 og 7 verður ásett, at um virkið steðgar virksemi sínum grundað á rættarúrskurð, so skulu ávísar lógargreinir ikki vera galdandi.

Viðv. § 2:
Í hesari lógargrein verður í stk. 1 ásett, at lógin ongar broytingar ger í teimum uppsagnarfreistum, sum ásettar eru í lóg, høvuðssáttmála ella setanaravtalu.

Í stk. 2 er ásett, at lógin ikki skal hava nakra ávirkan á tær reglur, skrivaðar ella óskrivaðar, sum annars eru galdandi um faklig tiltøk á arbeiðsmarknaðinum.

Viðv. § 4:
Sambært hesari lógargrein skal Føroya landsstýri hava heimild til nærri at áseta reglur fyri uppgerðini av talinum á teimum løntakarum, sum nevndir eru í § 1, stk. 1, umframt nærri staðfesting av staðfesting av hugtakinum virki í lógarinnar týdningi.

Viðv. § 5:
Sambært hesari grein skal arbeiðsgevarin hava skyldu til at taka upp samráðingar við løntakararnar á virkinum ella álitisfólkini, tá ætlanir eru um at fremja uppsagnir sambært § 1, stk. 1, í lógaruppskotinum.

Vit meta, eins og í grannalondum okkara, at løntakararnir og álitisfólkini skulu hava rætt at hava umboð fyri fakfelag teirra og persón við serligum sakkunnleika, sum t.d. løgfrøðing ella granskoðara við í sambandi við samráðingarnar.

Sum lógargreinin sigur, so er endamálið við hesum samáðingum at fáa í lag avtalur um at sleppa undan ella avmarka tær ætlaðu uppsagnirnar og høta um tær fylgjur, sum hesar uppsagnir koma at hava fyri løntakaran.

Viðv. § 6:
Í hesari lógargrein verður nærri tilskilað, hvørjar uppslýsingar arbeiðsgevarin hevur skyldu til at lata løntakarunum og álitisfólkunum í sambandi við tær samráðingar, sum skulu fara fram sambært § 5.

Í stk. 2 verður ásett, at avvarðandi fakfelag skal hava avrit av teimum upplýsingum, sum løntakararnir fáa.

Vit meta, tað vera náttúrligt, at fakfelagið, sum skal hava rætt at luttaka í samráðingunum sambært § 5, eisini skal hava innlit í málið á jøvnum føti við sjálvar løntakararnar.

Viðv. § 7:
Í § 7 er ásett tann mannagongd, sum skal nýtast, um so er, at arbeiðsgevarin kortini ætlar at fremja tær fráboðaðu uppsagnirnar.

Í lógargreinini er, eins og í grannalondum okkara, ásett, at arbeiðsgevarin ikki skal hava rætt at senda nevndu fráboðan, fyrrenn í fyrsta lagi 21 dagar eftir, at samráðingarnar eru liknar upp sambært § 5, um annað ikki er nevnt í høvuðssáttmála, og orsøkin til hesa áseting er, at vit meta, tað vera at royna at tryggja, at verulig ar samráðingar fara fram, tá talan er um slíkar uppsagnir, sum ofta hava stórar menniskjaligar avleiðingar við sær.

Viðv. § 8:
Vit meta, tað er rætt at áseta eina minstu uppsagnarfreist, tá talan er um slíkar uppsagnir av fleiri persónum samstundis.

Viðv. § 9:
Í lógargreinini verður ásett, at teir persónar, sum luttaka í samráðingunum sambært § 5, stk. 1, skulu hava tagnarskyldu viðvíkjandi teimum upplýsingum, sum eru givnar í trúnaði. Grundgevingin fyri hesari reglu er, at øll tey, sum luttaka í samráðingunum, skulu kunna tosa frítt, uttan at vandi er fyri, at nakað tekur fá um viðurskifti, sum viðkomandi luttakari hevur gjørt vart við verða lørd fram í trúnaði.

Viðv. § 10:
Í lógargreinini verður ásett tann samsyning, sum løntakarin skal hava, um so er, at arbeiðsgevarin ikki heldur reglurnar, sum ásettar eru í lógini.

Viðv. § 12:
Revsireglurnar eru ásettar í hesari grein, og sum vanligt er í slíkum førum, verður brot á nakrar av lógargreinunum sektað við bót.

1. viðgerð týsdagin 17. mars 1998. Uppskotið vard beint í tríggjarnevndina.

Málið fall hurtur sbr. stýrisskipanarlógini § 15 stk. 3, tí at løgtingsval var 30. apríl 1998, og málið ikki var lidugt viðgjørt á tingi fyri valið.

119 Uppskot til løgtingslóg um javning av almannaveitingum

Ár 1998, hósdagin 5. mars, legði Kristian Magnussen, landsstýrismaður, vegna landsstýrið fram soljóðandi

Uppskot
til
løgtingslóg um javning av almannaveitingum

§ 1. Henda lóg um javning av almannaveitingum er givin út sambært § 1, stk. 2, nr. 2 og 7 í ríkislóg nr. 315 frá 17. mai 1995 "om sosiale ydelser på Færøerne".

§ 2. Almannaveitingar, sambært lóg nr. 58 frá 15. mars 1967 "for Færøerne om folkepension", sbh. lógarkunngerð nr. 103 frá 2. mars 1988, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 37 frá 16. apríl 1997, lóg

nr. 55 frá 15. mars 1967 "for Færøerne om invalidepension m.v.", sbrb. lógarkunngerð nr. 101 frá 2. mars 1988, sum seinast broytt við lóg nr. 1131 frá 21. desember 1994 og løgtingslóg nr. 71 frá 20. mai 1996 um barnagjald til einsamallar uppihaldarar v.fl., sum broytt við løgtingslóg nr. 25 frá 14. mars 1997, verða frá og við 1. januar 1999 javnaðar eftir føroyska prístalinum sambært §§ 4-6.

§ 3. Pensiónsuppbæddirnar, uppbæddirnar fyri vanligt og serligt barnagjald, umframt tær ymsu frádráttarupphæddirnar o.a. í teimum í § 2 nevndu lógum, eru sum ásett í skjali 1.

§ 4. Upphæddirnar í skjali 1 verða tann 1. januar á hvørjum ári javnaðar við prosentvísu broytingini í miðalprístalinum fyri undanfarnu fyra ársfjórðingarnar januar-oktober í mun til miðalprístalið fyri sonn ársfjórðingar frammanundan.

§ 5. Tær soleiðis javnaðu árligu veitingaruppheddirnar verða avrundaðar til næmasta krónutalið, ið kann býtast við 12, meðan frádráttaruppheddirnar verða avrundaðar til næmasta krónutalið, ið kann býtast við 100.

§ 6. Landsstýrismaðurin í almannamálum ásetur við kunngerð javnaðu almannaveitingarnar í seinasta lagi 1. februar á hvørjum ári.

§ 7. Henda lóg kemur í gildi 1. januar 1999.

Almennar viðmerkingar

Í 1993 samtykti Fólkatingið ein nýggjan skattareform. Ein avleiðing av hesum varð, at m.a. almannaveitingar frá 1. januar 1994 skuldu javnast eftir einum øðrum grundarlagi enn higartil. Satsurin fyri 1994 varð settur til -2 %.

Í føroysku fólka- og avlarnispensiónslógunum, umframt í lógini um barnagjald til stakar uppihaldarar, varð ásett, at veitingar sambært lógini verða javnaðar samsvarandi tí, sum er galdandi í Danmark. Ætlan landsstýrisins var ikki, at hesar veitingar skuldu lækkast og í uppskoti til fíggjarlóg fyri 1994, varð henda upphædd óbroytt í mun til 1993. Tí bliva hesar omanfyri nevndu lógir broyttar. Í fólka- og avlarnispensiónslógunum stendur nú, at javningin: "reguleres efter hjemmestyrets nærmere bestemmelser". Í lógini um barnagjald til einsamallar uppihaldarar v.fl. stendur, at gjøld og stuðul sambært hesi lóg verða javnað eftir somu reglum, sum eru galdandi fyri almannaveitingar annars. Eitt lógaruppskot er lagt fram í løgtinginum, har fólka- og avlarnispensiónslógirnar eru samanskrivaðar. Í hesum lógaruppskotið stendur, at upphæddirnar sambært hesi lóg verða javnaðar eftir reglum, ásettar í serligari løgtingslóg.

Við hesum lógarbroytingum skuldi løgtingið áseta nærri reglur um, hvussu tær sosialu veitingarnar skulu javnast. Í hesum sambandi varð so eitt uppskot til løgtingslóg um áseting av almannaveitingum lagt fram. Saman við lógaruppskotinum lá eitt fylgiskjal, sum ásetti upphæddina av almannaveitingum. Henda lóg skuldi koma í gildi 1. januar 1994.

Í løgtinginum fór uppskotið í nevnd, Almanna- og heilsunevndina. Í álitinum frá nevndini stendur, at nevndin er samd um, at hesir satsir skulu regulerast, tí mælir nevndin til, at ein tíðaravmarking verður sett inn í fyriliggjandi lógaruppskot, og at landsstýrið eigur at fyrireika slíkar endaligar reglur at fáa gildi frá 1. januar 1996. Endaliga lógin kom í gildi 1. januar 1994 og fór úr gildi 31. desember 1995. Lógin er síðani broytt/longd, síðstu ferð í desember 1997. Hetta merkir, at lógin fer úr gildi 31. desember 1998. Í viðmerkingunum til tað síðsta broytingaruppskotið skrivar landsstýrismaðurin, at landsstýrismaðurin í almannamálum ætlar at fáa sær politiskt grundarlag at leggja fram eitt uppskot til løgtingslóg um javnan av almannaveitingum seinni í hesari tingsetu.

Løgtingið samtykti soleiðis longu í 1994 at áleggja landsstýrinum at leggja fyri tingið lógaruppskot við endaligum reglum um javnan av almannaveitingum, har heimilað verður landsstýrinum við kunngerð at áseta greiniligari reglur um fyrisitingina av hesari skipan.

Ein arbeiðsbólkur hevur arbeitt við at gera nágreiniligar útroknингar um, hvat árligi kostnaðurin má metast at verða, um almannaveitingarnar verða javnaðar eftir prístalinum ella lønarútviklinginum. Í tilmælinum frá

arbeiðsbólkinum stendur: "útfrá kanningini av, hvussu almannaveitingarnar fram til 1. juli 1993 hava verið javnaðar og út frá viðgerðini av verandi møguleikum at finna eitt hóskandi indeks fyri javnan av almannaveitingum, mælir bólkurin til, at almannaveitingarnar framyvir verða javnaðar eftir prístalinum á tann hátt, at veitingarnar verða broyttar hvønn tann 1. januar eftir prosentvísu broytingini í miðal prístalinum 4 teir seinastu ársfjórðingarnir áðrenn 1. januar í mun til miðalprístali fyri 4 ársfjórðingar tíðarskeiðið frammanundan".

Uppskotið førir við sær eina meirútreiðslu uppá 10,8 mió. kr. fyri 1999. Hetta er roknað út soleiðis, at ársfjórðingarnir

juli 1994 - apríl 1995 eru settir til indeks 100, har var meðalprístalið 154,1,
juli 1995 - apríl 1996 eru settir til indeks 102,5 har var meðalprístalið 158 og
juli 1996 - apríl 1997 eru settir til indeks 105,5 har var meðalprístalið 162,6.

Hækkingin uppá 10.8 mió. kr. er prosentvísa hækkingin, indeks 102,5 til 105,5, sum er 2,81%.

Hetta uppskot førir við sær, at pensiónsupphæddirnar, upphæddirnar fyri vanligt og serligt barnagjald, umframt tær ymsu frádráttarupphæddirnar o.a. verða javnaðar eftir føroyska prístalinum.

Somuleiðis verða upphæddirnar í forsorgarlógini og lógini um samsyning fyri at ansa eldri og óhjálpnum heima eisini javnaðar, tí hesar lógirnar vísa til pensiónslógina ella avlamispensiónslógina, tá upphæddirnar verða ásettar fyri ávísar veitingar.

Serligar viðmerkingar

Ad § 1. Lóg nr. 315 frá 17. mai 1995 "om sosiale ydelser på Færøerne"- rammulógin- heimilar heimastýrinum at gera løgtingslógir innan tað sosiala økið.

Ad §§ 2 - 3. Pensiónsupphæddirnar, upphæddirnar fyri vanligt og serligt barnagjald, umframt tær ymsu frádráttarupphæddirnar o.a. verða javnaðar eftir føroyska prístalinum sum ásett í hesi lóg. Galdandi upphæddir eru, sum ásett er í skjali 1. Somuleiðis verða upphæddirnar í forsorgarlógini og lógini um samsýning fyri at ansa eldri og óhjálpnum heima eisini javnaðar, tí hesar lógirnar í ávísan mun vísa til pensiónslógina ella avlamispensiónslógina, tá upphæddirnar verða ásettar.

Ad §§ 4 - 6. Upphæddirnar verða javnaðar á hvørjum ári. Hagstova Føroya roknar út javningar prosentið og landsstýrismaðurin í almannamálum ásetur við kunngerð upphæddirnar í seinasta lagi 1. februar á hvørjum ári

Ad § 7. Henda lóg kemur í gildi frá 1. januar 1999.

1. viðgerð týsdagin 17. mars 1998. Uppskotið varð heint í tríggjaðannevndina.

Málið fall burtur sbr. stýrisskipanarlógini § 15 stk. 3, tí at løgtingsval var 30. apríl 1998, og málið ikki var liðugt viðgjørt á tingi fyri valið.

FL. j.nr. 1010-17/98

120 Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um barnagjald til einsamallar uppihaldarar v.fl.

Ár 1998, hósdagin 5. mars, legði Kristian Magnussen, landsstýrismaður, vegna landsstýrið fram soljóðandi

Uppskot
til
løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um barnagjald til einsamallar uppihaldarar v.fl.

§ 1.
Í løgtingslóg nr. 71 frá 20. mai 1996 um barnagjald til einsamallar uppihaldarar v. fl., sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 25 frá 14. mars 1997, verður gjørd hendan broyting:
§ 23, stk. 2 verður orðað soleiðis:

"Stk. 2. Broyting í tí vanliga gjaldinum við gildi frá 1. januar, hevur gildi fyri tey gjøld, sum fella til gjaldingar áftaná hesa dagfesting."

§ 2.
Henda lóg kemur í gildi 1. januar 1999.

Viðmerkingar
Upphæddirnar verða javnaðar eftir somu reglum sum almannaveitingar annars. Neyðugt er tí at gera broytingar ella tillagingar í hesi lóg, um løgtingslógaruppskotið um javnan av almannaveitingum verður sett í gildi.

Í galdandi lóg stendur, "at broytingin í tí vanliga gjaldinum við gildi frá einum 1. apríl ella 1. oktober, hevur gildi fyri tey hálvársgjøldini, sum forfella áftaná hesa dagfesting". Sambært lógaruppskotinum um javnan av almannaveitingum, verða upphæddirnar javnaðar 1. januar á hvørjum ári eftir føroyska prístalinum.

1. viðgerð týsdagin 17. mars 1998. Uppskotið verður beint í trivnaðarnevndina.

Málið fall burtur sbr. stýrisskipanarlógini § 15 stk. 3, tí at løgtingsval var 30. apríl 1998, og málið ikki var liðugt viðgjørt á tingi fyri valið.

F.L. j.nr. 1015-19/93

121 Uppskot til løgtingslóg um útjavningarstuðul til útjaðaraøki

Ár 1998, hósdagin 5. mars, legði Eilif Samuelsen, landsstýrismaður, vegna Edmund Joensen, løgmann, vegna landsstýrið fram soljóðandi

Uppskot
til
løgtingslóg um útjavningarstuðul til útjaðaraøki

§ 1. Landsstýrismanninum í samferðslumálum verður heimilað at gera avtalu við almennu flutningsfeløgini um at útlíkna ein part av meirkostnaðinum av at flyta fasthúgvandi, olju og annan farm til útjaðararøkini.
Stk. 2. Útjaðaraøki eru eftir hesi lóg at skilja sum Fugloy, Svínoy, Mykines, Gásadalur, Hestur, Koltur, Skúvoy og Stóra Dímun.

§ 2. Henda lóg kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

Almennar viðmerkingar
Endamálið við lógini er at veita studning til útjaðaraøkini í Føroyum, ásannandi at tað er ein meirkostnaður at búleikast á útjaðaraøkjum.

Í sambond við tingviðgerðina av uppskoti til fíggjarløgtingslóg fyri 1998 ásannaði tingið, at neyðugt er at veita studning fyri at veirðveita eitt róniligt búleikamynstur í Føroyum, og setti fíggjarnevndin tí fram uppskot um at játta 1. mió. kr. til endamálið, við hesum viðmerkingum: *Játtanin er til tess at útlikna meirkostnaðin av at flyta fasthúgvandi, olju og farm. Støðini talan verður um, eru tey, har tað er ein meirkostnaður í mun til flutningin við høvuðsfarleiðum. Lógaruppskot hesum viðvíkjandi verður lagt fram í hesi tingsetu, har ásett verða nærri reglur fyri, hvussu landsstýrismaðurin í samferðslumálum skal umsita hesa játtan.*"

Ætlanin er at Vinnumálastýrið ger avtalu við Strandfaraskip Landsins og tyrlutænastuna hjá Atlantic Airways, soleiðis at kostnaðurin fyri farmaflutning lækkar, og at landsstýrið síðan endurrindar hesum fyritøkum inntøkumissin, sum svarar til í mesta lagi 1. mió. kr.

Sum fasthúgvandi er at skilja tey fólk, sum eftir reglunum í skattalógini hava fastan bústað á hesum ptássum.

Fyrisitingarligi kostnaðurin av hesi lóg er ongin. Tingið samtykkir á hvørjum ári hvussu stór uppbæðd skal játtast til endamálið.

1. viðgerð fríggjadagin 13. mars 1998. Uppskotið vard beint í mentanarnevndina.

Málið fall burtur sbr. stýrisskipanarlógini § 15 stk. 3, tí at løgtingsval var 30. apríl 1998, og málið ikki var liðugt viðgjørt á tingi fyri valið.

F.L.jur. 1953-2/98

122 Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um ferðslu

Ár 1998, hásdagin 5. mars, legði Eilif Samuelsen, landsstýrismaður, vegna Ivar Johannesen, landsstýrismann, vegna landsstýrið fram soljóðandi

Uppskot
til
løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um ferðslu

§ 1.
Í løgtingslóg um ferðslu, smb. løgtingslógarkunngerð nr. 14 frá 2. mars 1988, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 59 frá 20. mai 1996, verða gjørdar hesar broytingar:

1. § 2, VIII. verður orðað soleiðis:
   "Lyktatendringartíðin: Tíðin frá sólsetur til sólarris og annars tá nýtsla av lyktum akfarsins er neyðug orsakað av myrkri, mjørka, támi, regni ella líknandi vánaligum synis- ella ljósviðurskiftum antin fyri at akfarið gerst sjónligt fyri øðrum ferðandi ella fyri at geva føraranum nóg stóra sjónarvídd."
2. Í § 10, stk. 1, verður "løgmálaráðið" broytt til: "ferðslumálaráðið".
3. § 15, 2.-3. pkt. verður sett úr gildi.
4. Í § 16, stk. 3, verður "0,80 0/00" broytt til: "0,50 0/00".
5. Aftaná § 16a verður sett:
   "Brúk av lartelefon og øðrum teleútbúnaði
   § 16b. Førari av akfari má ikki undir køyring gera brúk av handhildnum lartelefonum.

Stk. 2. Landsstýrismaðurin kann áseta nærri reglur om nýtslu av øðrum teleútbúnaði ella líknandi undir koyring".

6. Í § 18 verður sett sum stk. 10:
"Stk. 10. Landsstýrismaðurin kann áseta, at tær av ferðslumálaráðharranum givnu ásetingarnar um heilsuligu krøvini fyri útgevan og endurnýggjan av koyrikortum heilt ella partvíst skulu galda her í landinum. Ásetingarnar verða ikki kunngjørdar."
7. Yvirskriftin til § 18a verður broytt soleiðis:
"Koyrikort til traktor, motoramboð og lítla motorsúkklu".
8. Í § 18a verður sett sum stk. 4:
"*Stk. 4.* Motorsúkkla við slagvolumon uppá ikki yvir 50 cm3 og við eini konstruktívt ásettari ferð uppá í mesta lagi 45 km/t má einans førast av persónum, sum hava fingið koyrikort til bil ella motorsúkklu."
9. § 18e, stk. 3, verður "Hevur persónur mist koyrirættindini" broytt til: "Hevur persónur treytaleyst mist koyrirættin".
10. Í § 18c, stk. 3, verður "leiðbeinandi" á tveimum støðum broytt til: "eftiransandi".
11. Í § 18c, stk. 3 verður sett inn eftir 1. pkt.:
"Hevur persónur mist koyrirættin treytaleyst orsaka av rúsdrekka- ella promillukoyring, kann hann, tá ið frádømatíðin er umliðin, einans aftur-vinna koyrirættin aftaná nýggja koyrifrálæru og ein eftiransandi koyriroynd er staðin."
12. Í § 18c, stk. 3 verður aftaná "Hevur hin dømdi" sett inn: "í øðrum førum enn teim í 2. pkt. nevndu".
13. Í § 18c verður sett sum nýtt stk. 4:
"Stk. 4. Hevur persónur mist koyrirættin treytað, skal hann innan eina freist, sum verður ásett av løgregluni, til eina eftiransandi koyriroynd. Koyrirætturin verður tikin um viðkomandi ikki stendur royndina ella letur vera við at fara til bana. Eftiransandi roynd verður ikki krevd um so at hin dømdi hevur staðið eina koyriroynd aftaná tilburð, sum var orsøk til frádømingina."
Stk. 4 og stk. 5 verður hereftir stk. 5 og stk. 6.
14. 18c, stk 4, sum við hesi lóg er broytt til stk. 5, verður orðað soleiðis:
"Stk. 5. Landsstýrismaðurin setir reglur um innihaldið í koyrifrálærumi í samband við endurvinning av koyrirættinum aftaná eina treytaleysa frádøming, smb. stk. 3, 2. pkt., og um eftiransandi koyriroynd, herundir um afturtøku av koyrirættinum sambært stk. 4, og um gjaldið fyri royndina."
15. § 27 verður orðað soleiðis:
"**§ 27.** Eingin má leypa av ella uppá eitt akfar, sum er í gongd, ella uppihalda seg á gáttini á akfari ella líknandi, uttan at tað er serliga góðkent til hetta.
Stk. 2. Sleða, handvognur ella líknandi má ikki heingjast aftaná akfari. Tann, sum stendur á skíðum, skoytum, rulluskoytum ella líknandi, má ikki togast av akfari.
Stk. 3. Á vegi má ikki koyrast á rullubretti ella líknandi ella gerast hálku- ella skreiðibreytir. Á vegi burtursæð frá vegi, sum er merktur sum spæligøta, má ikki spælast ella spælast bólt ferðslu til hága."
16. Í § 30a, stk. 2 verður sett sum 2. pkt.:
"Í fjølbygdum øki kann á líknandi hátt ásetast ein lægri hámarkferð fyri eitt nærri avmarkað øki."
17. Í § 30a verður sett sum nýtt stk. 3.:
"Stk. 3. Fyri eitt vegastrekki kann ásetast ein lægri hámarksferð enn lægstamarkið fyri ferð, um so er, at umstøðurnar, hernandir fyritlitini fyri aðrari ferðslu loyva tí, og avgerandi ferðslutrygdarlig fyritlit ikki taka ímóti."
18. § 30b verður orðað soleiðis:
"**§ 30b.** Fyri bussar, hvørs loyvda totalvekt er yvir 3.500 kg, má ferðin óansæð § 30a ongantíð fara upp um 70 km/t. Í fjølbygdum øki má ferðin ikki fara upp um 50 km/t, sjálvt um ein hægri staðbundin hámarkferð er ásett.
Stk. 2. Fyri aðrar bilar, hvørs loyvda totalvekt er yvir 3.500 kg (lastbilar) og fyri vognarøð samansett av einum lastbili ella bussi, hvørs loyvda totalvekt er yvir 3.500 kg, og einum skrásetingarskyldugum viðfestum akfari má ferðin óansæð § 30a ongantíð fara upp um 70 km/t. Í fjølbygdum øki má ferðin ikki fara upp um 50 km/t, sjálvt um ein hægri staðbundin hámarksferð er ásett.
Stk. 3. Fyri bilar við eini loyvdari totalvekt uppá ikki yvir 3.500 kg má ferðin hóast § 30a ongantíð fara upp um 70 km/t, um viðfestur er viðfestur vognur, leguvognur ella skrásetingarskyldugt viðfest amboð, herímillum húsvognur.
Stk. 4. Fyri bilar, ið hava viðfest eitt ikki skrásetingarskyldugt amboð, og fyri traktorar og motoramboð má ferðin óansæð § 30a ongantíð fara upp um 30 km/t.
Stk. 5. Fyri motordrivið akfar ella vognarað við eitt ella fleiri hjólpørum við massivari hjólklæðing, má ferðin óansæð § 30a ongantíð fara upp um 15 km/t.
Stk. 6. Tá motordrivið akfur verður skrásett ella

góðkent, kann serligt lægri hægstamark setast fyri ferð, um so at tess tilgerð ger tað neyðugt.

Stk. 7. Landsstýrismaðurin kann, um viðurskiftini tala fyri hesum, seta lægri hámarksferð enn fyriskrivað eftir stk. 1-5, galdandi fyri serlig slóg av akfarum, um so er, at ferðslutrygdarligar ella akfarstekniskar grundir ikki tala ímóti hesum."

19. § 33a, stk. 2, nr. 3-4 verður orðað soleiðis:
"3) soleiðis at atgongd til annað akfar verður tarnað, ella at hetta ikki kann førast frá staðnum,
4) út fyri brandkranar ella".

20. Í § 33a, stk. 2 verður sett inn sum nýtt nr. 5.:
"5) á akbreytini á hovudsvegum uttanfyri fjølbygt øki"

21. § 35, stk. 4, 3. pkt., og stk. 5 verður strikað.
Stk. 6-8 verða hereftir stk. 5-7.

22. Aftaná § 35 verður sett sum nýggj § 35a:
"**§ 35a.** Tá koyrt verður uttanfyri lyktatendringartíðini skulu nærljósini (stutt ljós) nýtast á motordrivnum akførum. Tá koyrt verður við motorambuðum er hetta bert galdandi, um motorambuðið er útgjørt við nærljóslyktum. Í staðin fyri nærljós kunnu nýtast serlig koyriljós.

Stk. 2. Ásetingin í stk. 1 verður ikki nýtt, tá koyrt verður við akførum, sum eru í gerð ella undir umvæling.

Stk. 3. § 35, stk. 7, er eisini galdandi undir koyring uttanfyri lyktatendringartíðini."

§ 35a, § 35b og § 35c verða hereftir ávikavist § 35b, § 35c og § 35d.

23. Í § 35c, sum við hesi lóg er broytt til § 35d verður "§ 35b" broytt til: "§ 35c".

24. Aftaná § 36a verður sett:
"**§ 36b.** Húsvognur nú ikki nýtast til flutning av persónum."

25. § 42 verður orðað soleiðis:
"Trygdarútgerð.

§ 42. Um sætt í einum bili ella tryhjólaðari motorsúkklu hevur trygdarbelti, skal hetta undir koyring nýtast av tí persóni, sum í sætinum situr. Ferðandi á baksetrinum í bilum skulu, um sæti við trygdarbelti er tókt á baksetrinum, nýta hetta sæti.

Stk. 2. Børn, sum eru fylt 3 ár, men enn ikki 7 ár, kunnu ístaðin fyri trygdarbelti nýta barnastól. Saman við trygdarbeltinum kann selakoteb nýtast.

Stk. 3. Børn undir 3 ár skulu undir koyring í bili tí í mesta lagi 9 persónar og í bili við einari loyvdari vekt uppá ikki yvir 3.500 kg nýta trygdarbelti, barnastól ella aðra trygdarútgerð tillagaða hvørjum barni og vektini á barninum. Skyldan at nýta serliga tillagaða trygdarútgerð er ikki galdandi, um so er, at barnið situr á baksetrinum, og eingin trygdarútgerð er tøk til barnið.

Stk. 4. Skyldan at nýta trygdarútgerð er ikki galdandi undir bakking ella undir koyring á parkeringsplássi, bensinstøð, verkstaðarøki ella undir líknandi viðurskiftum.

Stk. 5. Landsstýrismaðurin kann seta reglur, sum loysa ávisar persónar frá skyldini at nýta trygdarbelti. Landsstýrismaðurin kann harumframt seta reglur, sum loysa frá skyldini at nýta trygdarbelti fyri serstøk slóg av koyring.

Stk. 6. Bilførarin skal ansa eftir, at ferðandi, sum ikki eru fylt 15 ár, nýta trygdarútgerð sambært stk. 1-3."

26. § 43, stk. 3 verður strikað.
Stk. 4-5 verður hereftir stk. 3-4.

27. § 58 verður orðað soleiðis:
"**§ 58.** Rúsdrekkakoyring við motorakfari, traktori ella motorambuði verður revsað við sekt. Hevur alkoholnøgdin í blóðinum við koyringina ella aftaná verið omman fyri 2.00 o/oo er revsingin varðhald ella fongsul upp til 1 ár. Sama er galdandi, um alkoholnøgdin í blóðinum í ella aftaná tíðarbilið, sum nevnt er í § 16, stk. 1, 2. pkt., er farin upp um 2.00 o/oo.

Stk. 2. Revsingin eftir stk. 1, 1. pkt. kann hækka til varðhald ella fongsul í upp til 1 ár, um førari

1) áður er dømdur fyri rúsdrekka- ella promillukoyring,
2) verður funnin sekur í fleiri tilburðum av rúsdrekka- ella promillukoyring, ella
3) við stórum fyrilitsloysi fyri ferðslutrygdini hevur valt fólki ella luti skaða ella elvt til vanda fyri tí.

Stk. 3. Promillukoyring verður revsað við sekt. Sama er galdandi fyri rúsdrekkakoyring við prutli. Fer hin seki áður dømdur fyri rúsdrekka- ella promillukoyring, kann revsingin hækka til varðhald ella fongsul í upp til 1 ár.

Stk. 4. Brot á § 15, § 18, stk. 1, § 18a, stk. 1 og stk. 4, og § 26, stk. 1, verður revsað við sekt ella um umstøðurnar eru herðandi við varðhaldi ella fongsul í upp til 1 ár.

Stk. 5. Tann, sum koyrir motordrivið akfar, sum koyritkort krevst til, hóast viðkomandi treytaleyst er frídømdur rættin til at vera ella gerast førari á tílíkum akfari, verður revsaður við varðhaldi ella fongsul upp til 1 ár, ella um umstøðurnar eru serliga lættandi, við sekt."

28. Eftir § 58 verður sett sum nýggj § 58a:

"§ 58a. Við sekt verður tann revsaður, sum

1) brytur § 4, § 11, stk. 1, § 12, § 14, § 16, stk. 5-6, § 16b, stk. 1, § 17, § 18c, stk. 2 og stk. 6, § 19, stk. 1-3, § 19a, stk. 1, § 20, §§ 23-24, § 25, stk. 2, stk. 4, 2-3 pkt., stk. 5 og stk. 6, § 26, stk. 2-3, §§ 27-28, § 29, stk. 1-3 og stk. 5, §§ 29a-e, § 30, §§ 30a-b, § 31, §§ 31a-e, § 32, stk. 1-7, § 32a, § 33, § 33a, §§ 34-35, § 35a, stk. 1, § 35b, stk. 1, § 35c, § 36, stk. 1-3, § 36b, § 37, stk. 2, § 39, stk. 1-2, § 40, stk. 1, § 41, § 42, stk. 1 og stk. 6, § 42a, stk. 1-2, §§ 43-46, §§ 46a-b, § 48, stk. 4, §§ 49, 51, 53, 55 og 62, stk. 4.
2) brýtur tær við lógini givnu fyriskipanir,
3) fjónar treytir fyri einum loyvi sambært lógini ella sambært fyriskipanum, útgivnum sambært lógini, ella
4) ger ikki eftir banni ella boðum, tá givin eru sambært lógini ella sambært fyriskipanum útgivnum sambært lógini.

Stk. 2. Við áseting av sekt fyri brot á § 4, § 16, stk. 5-6, § 17, § 19, § 24, stk. 1, § 28, § 29, stk. 1-2, § 29a, stk. 1-4, § 29b, § 29c, stk. 1, § 29d-e, § 30, § 31, §§ 31a-e, §§ 32, 32a, 33, 33a, 34-35, §§ 35a-c og §§ 36-36b, § 37, stk. 2, § 39, stk. 1-2, §§ 42-42a, 43-45 og § 45a, stk. 2-3, verður sektin herd.

Stk. 3. Sekt fyri brot á §§ 30a og 30b skal ásetast við fyriliti til almennu økingina av vága, sum brotið á hægstamarkið fyri ferð ber við sær. Fyri brot á hægstamarkið fyri ferð framd við koyring av bussi og lastbili, hvørs loyvda totalvekt er yvir 3.500 kg, ella vognrøð samansett av sovorðnum akførum og skrásetingarskyldugum viðfestum vognum, verður somuleiðis ásett ein herðað sekt.

Stk. 4. Brot á tær í § 58 e, stk. 1, nr. 1-7 nevndu ásetingar og forboð verður tó bert revsað, um steðgurin ella parkeringin hevur verið øðrum at váða ella til óneyðugan ampa fyri ferðsluna.

Stk. 5. Í fyriskipanum, sum verða útgivnar sambært lógini, kann ásetast revsing við bót fyri brot á áselingarnar í fyriskipanunum.

Stk. 6. Fyri brot á fyriskipanir, ið er givnar sambært § 38, stk. 1, kann áleggjast eigaranum ella brúkaranum av akfarinum sektarábyrgd, sjálvt um brotið ikki kann tilroknast honum sum gjørt við vilja ella av ósketni. Fyri sektarábyrgd verður ikki ásett umskiftisrevsing.

Stk. 7. Er brotið framt av partafelag, lutafelag ella líknandi, kommunu ella kommunalum felagsskapi, kann sektarábyrgdin áleggjast felagnum, kommununi ella kommunala felagsskapinum, sum slíkt."

29. Eftir § 58a verður sett inn sum nýggj § 58b:

"Inndrátt

§ 58b. Við serliga grovum ella endurtakandi brotum á ferðslulógina kann hald leggjast á tað við brotinum nýtta akfarið, um so er tað verður hildið at vera neyðugt fyri at forða fleiri brot á ferðslulógina, og um inndrátturin ikki er órímuligur.

Stk. 2. Annars eru reglurnar í borgarligu revsilógini um inndrátt galdandi.

30. Eftir § 58b verður sett inn sum nýggj § 58c:

"Afturhalding av akførum

§ 58c. Um bæði førarin og tað motordrivna akfarið, sum brotið er framt við, eru heimahoyrandi uttanlands, kann løgreglan afturhalda akfarið til skyldugur sektir, steðgi og parkeringsgjøld, sakarmálskostnaður, endurgjøld ella gjøld fyri lógarbodna ábyrgdartrygging eru goldin, ella trygd er veitt fyri gjaldingini. Um upphæddin ikki er goldin innan 2 mánaðar eftir at avgerð er falin í málinum, kann fulnaður gerast í akfarinum.

Stk. 2. Við atliti til at seta í verk hald eftir stk. 1 kunnu reglurnar í rættargangslógini §§ 782 og 783 um at leggja hald á lutir, ið hildið verður, skulu íondragast, nýtast. Afturhald kann bert gerast, um tað verður mett neyðugt fyri at tryggja gjalding av teim nevndu upphæddum. Um føratin av órøttum hevði akfarið, kann hald ikki fremjast.

Stk. 3. Burtursæð frá skyldugum steðgingar- og parkeringsgjøldum kann reglan í stk. 1 ikki nýtast við atliti til føratur, ið eru heimahoyrandi í Finlandi, Íslandi, Noregi ella Svøríki."

§ 58a, § 58b, § 58c, § 58d og § 58e verða hereftir ávikavist § 58d, § 58e, § 58f, § 58g og § 58h.

Yvirskriftirnar broytast samsvarandi.

31. Í § 58a, stk. 4, sum við hesi lóg verður broytt til § 58d, stk. 4, verður "§ 58, stk. 2" broytt til: "§ 58a, stk. 4."

32. § 58b, stk. 1 og stk. 2, sum við hesi lóg verður broytt til § 58e, stk. 1 og stk. 2, verður orðað soleiðis:

"**§ 58e.** Løgreglan kann áleggja eitt gjald fyri brot á

1) § 33, stk. 2, 1. pkt.
2) § 33, stk. 4,

3) § 33a, stk. 1, nr. 1, 2, 4, 6, 7, 8, 9 og stk. 2, nr. 1, viðvíkjandi parkering framanfyri inn- og úkoyring til og frá hústom, nr. 4 og 5,
4) § 47a,
5) forboð móti steðgi og parkering, sum er ávist við merking,
6) forboð móti steðgi og parkering, sum ásett verður sambært § 47, hóast forboðið ikki er ásett við merking,
7) øðrum ásetingum um steðg og parkering sum ásettar verða sambært §§ 47 og 47a.

Stk. 2. Avgerð um áleggjan av gjaldi ber ikki til at kæra til hægri fyrisitingarligan myndugleika. Gjaldið ognast landskassanum ella eftir samráðing við viðkomandi by- ella bygdaráð, kommunukassanum."

Stk. 2-6 verður hereftir stk. 3-7.

33. Í § 58e, stk. 2, sum við hesi lóg er broytt til § 58f, stk. 2, verður "§ 58d" broytt til: "58g".

34. § 58d, stk. 1, sum við hesi lóg er broytt til § 58g, stk. 1, verður orðað soleiðis:

"Um mál um rúsdrekka- ella promillukoyring ikki verður metin at hera við sær hægri revsing enn sekt, ella tað fyriliggur eitt mál við spurningi um frádoming av koyriretting sambært § 59a, stk. 1, nr. 3 ella 4, kann ákæruvaldið í staðin fyri at lata inn ákærurit til rættin boða hinum skuldsetta frá, at málið kann verða avgreitt uttan rættarsøku, um skuldsetti viðgongur seg sekan í brotinum, og váttar seg fúsan til innan eina ávísa freist, ið eftir áheitan kann verða longd, at gjalda sekt, ið uppgivin er í fráboðanini, og samtykkir treytaða ella treytaleysa frádoming av koyrirættinum í eitt tíðarskeið, ið er ásett í fráboðanini."

35. § 58d, stk. 3, sum við hesi lóg er broytt til § 58g, stk. 3, verður orðað soleiðis:

"*Stk. 3.* Mál um rúsdrekka- og promillukoyring, ið ikki hava við sær hægri revsing enn sekt, og mál, har spurningurin um frádoming av koyrirættinum verður reistur sambært § 59a, stk. 1, nr. 3 ella 4, kunnu, tá rættarin ikki hevur orsók til iva um, at hin ákærdi er sekur, verða avgreidd við, at hin ákærdi í rættinum samtykkir at gjalda nærri ásetta sekt og samtykkir treytaða ella treytaleysa frádoming av koyrirættinum í nærri ásetta tíð."

36. Í § 58e, sum við hesi lóg er broytt til § 58h, verður "§ 58d, stk. 1," broytt til: "§ 58g, stk. 1".

37. § 59 verður orðað soleiðis:

"§ 59. Rættarin til at koyra motordrivið akfar, sum koyrikort krevst til, tó ikki prutl, skufu verða frádømd førara av tílíkum akfari, um hann hevur gjort seg sekan í rúsdrekkakoyring.

Stk. 2. Frádoming hendir treytaleyst. Eru umstøðurnar serliga lættandi, kann frádomingin tó verða treytað."

38. § 59a verður orðað soleiðis:

"**§ 59a.** Rættarin til at koyra tey í § 59 nevndu akfør skal haraftrat frádømast førara av tílíkum akfari, um so er, at

1) hann við stórum fyrilítsloysi fyri ferðslutrygdini hevur volt fólki ella luti skaða ella elvt til vandu fyri tí,
2) hann hevur gjort seg sekan í promillukoyring við eini alkoholmongd í blóðinum undir ella uttanfyri koyringina yvir 0,80 0/00,
3) hann hevur koyrt við ferð, ið fer upp um loyvdu hámarksferðirnar sambært § 30a, stk. 1 og stk. 3 við meira enn 30 km/t ella eini lægri hámarksferð ásett sambært § 30a, stk. 2, ella § 47 við meiri enn 20 km/t,
4) undir koyring við eitt av tem í § 30b nevndu akførum hevur koyrt við ferð hægri enn loyvdu hámarksferðirnar fyri tílík akfør ella eini lægri hámarksferð ásett sambært § 30a, stk. 2, ella § 47 við meiri enn 20 km/t, ella
5) grundir eru fyri frádoming í tí, hvussu brotið er háttað, og tí, sum annars er upplýst um viðurskifti hins ákærda sum førara av motordrivnum akfari.

Stk. 2. Frádoming verður treytað, um ikki førarin

1) við vilja hevur volt skaða á annan persón ella lut, við vilja hevur elvt til nærliggjandi vanda fyri hesum ella annars hevur koyrt motordrivið akfar á serliga fyrilitsleysan hátt,
2) hevur gjort seg sekan í tveimum ella fleiri tilburðum, ið hvør sær eru fevndir av stk. 1, nr. 1–4,
3) áður er frádømdur koyrirættin treytað, og tann nýggi tilburðurin er gjørdur í royndartíðini, ella
4) áður er frádømdur koyrirættin treytaleyst, og tann nýggi tilburðurin er gjørdur innan 5 ár eftir at frádomingarfríðin er runnin.

Stk. 3. Undir serliga lættandi umstøðum kann frádoming verða treytað í førum, har frádoming eftir stk. 2 annars skuldi verið treytaleys."

39. § 59b verður orðað soleiðis:

"**§ 59b.** Treytaleys frádoming verður gjørd fyri eitt tíðarskeið uppá millum 6 mánaðir og 10 ár ella fyri alla tíð. Treytaleys frádoming fyri rús

drekkakoyring, har alkoholnøgdin í blóðinum undir ella aftaná koyringina er farin upp um 2,00 o/oo, verður tó fyri eitt tíðarskeið uppá minst 2 ár og 6 mánaðir. Sama er galdandi um alkoholnøgdin í ella aftaná tað í § 16, stk. 1, 2. pkt., nevnda tíðarskeiði er farin upp um 2,00 o/oo.

40. Eftir § 59b verður sett inn sum nýggj § 59c:
"**§ 59c.** Treytað frádøming verður við teimum treytum, at viðkomandi í eini royndartíð uppá 3 ár frá endaligum dómi ella viðtøku eftir § 58g, stk. 1 ella stk. 3, ikki koyrir motordrivið akfar undir slíkum umstøðum, at koyriraetturin skal frádømast honum. Við treytaðari frádøming verður frádømingartíðin útsett. Undir serligum umstøðum kann ásetast ein royndartíð upp til 5 ár fyri ta treytaðu frádømingina.
Stk. 2. Um tann dømdi ella tann, ið hevur tikið við frádøming eftir § 58g, stk. 1 ella stk. 3, í royndartíðini fremur ein nýggjan tilburð, ið ber við sær frádøming af koyriraettinum, ásetir raetturin eina felags frádøming fyri henda tilburð og tað áður avrádda lógarbrotið."
§ 59c, § 59d, § 59e og § 59f verða hereftir ávikavist § 59d, § 59e, § 59f og § 59g.
Yvirskriftirnar verða broyttar samsvarandi.
41. Í § 59c, stk. 1, sum við hesi lóg er broytt til § 59d, stk. 1, verður "frádøming" broytt til: "treytaleys frádøming".
42. Í § 59 d, stk. 1, sum við hesi lóg er broytt til § 59e, stk. 1 verður "§ 59c" broytt til: "§ 59d".
43. § 59d, stk. 2, sum við hesi lóg er broytt til § 59e, stk. 2, verður orðað soleiðis:
"*Stk.* 2. Verður í máli, har koyriraetturin er tikin aftur eftir § 59d, fríkennandi dómur sagdur við atliti til spurningin um frádøming, ella frádømingin verður treytað, skal koyrikortið útflyggjast, hóast dómurin verður kærdur."
44. Í § 59e, sum við hesi lóg er broytt til § 59f, verður sett sum nýtt stk. 2:
"*Stk.* 2. Er koyriraetturin frádømdur vegna rúsdrekka- ella promillukoyring, kann spurningurin um at fáa koyriraettin aftur tó leggjast fyri dómstólarnar, tá helvtin av frádømingartíðini - tó í minsta lagi 1½ ár - er fráliðið. Um koyriraetturin í sovorðnum førum er frádømdur fyri allar tíðir, kann spurningurin um at fáa koyriraettin aftur í fyrsta lagi leggjast fyri dómstólarnar, tá ið 5 ár av frádømingartíðini eru fráliðin. Koyriraetturin kann einans látast aftur, um viðkomandi í minst 1 ár frammanundan at málið verður lagt fyri raettin, hevur yvirhildið eina eftirvansandi viðgerð fyri rúsdrekkamisnýtslu."

§ 2.

Spurningar um frádøming av koyriraettinum í sambond við tilburðir, sum eru framdir, men ikki endaliga dømdir, tá ið lógin kemur í gildi, verða aleina avgjørdir eftir reglunum í hesi lóg.
Stk. 2. Skal koyriraetturin sambæra slíkum tilburði frádømast eftir reglunum í § 59a, nr. 1), nr. 3), nr. 4) ella nr. 5), er § 59a, stk. 2, nr. 4), tó ikki galdandi fyri eldri frádømingar, sum eru hendar í sambond við brot á § 16, stk. 1 ella stk. 3.
Stk. 3. Frádøming av koyriraettinum eftir hígartil galdandi reglum varðveita teirra gildi og hava somu raettaravleiðingar sum treytaleys frádøming, smb. tó stk. 4.
Stk. 4. Um frádømingartíðin er ásett til 1 ár fyri promillukoyring ella 6 mánaðir fyri brot á ásetingarnar um ferð, og dómurin ikki er fullførdur, tá ið lógin kemur í gildi, fellur fullføringin ella ídestandi partin av hesi bortur. Hin dømdi skal innan eina freist ásetta av løgregluni upp til eina eftirvansandi roynd, smb. § 18c, stk. 4. Fyri hesar frádømingar av koyriraettinum verður freistin hartil í § 59a, stk. 2, nr. 4), sett til 3 ár.

§ 3.

Henda lóg kemur í gildi dagin eftir, hon er kunngjørd, smb. tó stk. 2 og 3.
Stk. 2. § 1, nr. 5, kemur í gildi tann 1. januar 1999.
Stk. 3. Landsstýrismaðurin ásetur nær § 1, nr. 11 og 12 koma í gildi.
Stk. 4. § 1, nr. 44 eru eisini galdandi í førum, har koyriraetturin er frádømdur áðrenn lógin kom í gildi.

Almennar viðmerkingar til lógaruppskotið

Lógaruppskotið hevur nevnd sett av landsstýrismanninum í ferðslumálum gjørt. Nevndin varð sett við skrivi dagf. 04.08.1997. Eisini hevur nevndin gjørt niðanfyri standandi almennu viðmerkingar og viðmerkingarnar til einstøku greinirnar í lógaruppskotinum.

Landsstýrismaðurin tekur undir við viðmerkingunum hjá nevndini og setur fram lógaruppskotið samsvarandi hesum.

Uppskotið fer ongar fíggjarligar avleiðingar fyri landskassan.

Eitt uppskot til broyting av ferðslulógini varð gjørt av nevndini, ið landsstýrismaðurin setti við skrivi frá 3. august 1977 til endurskoðan av ferðslulógini, og sent landsstýrinum tann 13. februar 1995.

Í nevndini sótu:

Jalgrim Hilduberg, skrivstovustjóri, Landsskrivstovan
Atli Jensen, bileftirlitsstjóri, Bileftirlitið
Jón Kragesteen, Ráðið fyri Ferðstrygd
Mogens Nepper-Christensen, landfúti (formaður)
Jógvan Nolsøe, sivilverkfrøðingur, Landsverkfrøðingurin

Tær týdningarmiklastu broytingarnar í lógaruppskotinum eru hesar:

1) Broytingar av hámarksferðini fyri serlig sløg av akførum.
2) Gera ásetingar um kravda nýtslu av nærljósum ella serligum koyriljósum tá koyrt verður uttanfyri fyktalendringartíðina.
3) Broyting í áselingum um nýtslu av trygdarútgerð, heruppií, at børn undir 15 ár skulu nýta trygdarútgerð.
4) Broyting av revsireglunum, soleiðis at tá fyrstu ferð brot verður fram kann viðkomandi í frádømingarskeiðnum í staðin fyri styttri frælsisrevsing verða revsaður við sekt.
5) Broyting av revsireglunum soleiðis at giyin verður ein herd sekt fyri ávís brot á ferðslulógina - ferðsluhættislig misbrot og brot á hámarksferðina.
6) Gera ásetingar um tøku av motorakfari nýtt við serliga grov ella endurtikin brot á ferðslulógina.
7) Gera ásetingar um treytaða frádøming í førum av koyriskeivleikum og promillukoyring.
8) Gera ásetingar um afturútvegan af førararættindum í førum, har viðkomandi hevur yvirhildið eina eftiransaða viðgerð fyri rúsdrekkamisnýtslu.

Nakrar av uppskotsbroytingunum er ein herdan av galdandi ásetingum í ferðslulógini, meðan aðrar hava ávísan linna við sær. Eisini er ein hóskandi tillaging gjørd til donsku ferðslulóggávuna.

Lógaruppskotið varð ikki lagt fyri Løgtingið. Nakrar fáar ásetingar, sum í høvuðsheitunum snúi seg um viðurskifti, ið høvdu samband við, at Bileftirlitið yvirtók umsitingina av koyrikortum og skráseting av motorakførum, vóru viðgjørdar og samtyktar við tveimum løgtingslógum í 1996 við grund í lógaruppskoti sent landsstýrinum tann 30. november 1995. Hesar ásetingar vóru samstundis tiknar úr uppskotinum frá 13. februar 1995.

Í juli mánað 1997 hevði nevndarformaðurin ein fund við Sámal Petur í Grund, landsstýrismann, við atliti at eini samráðing um framhaldandi viðgerð av lógaruppskotinum og umskipan av nevndini.

Aftaná hesar samráðingar er eitt soljóðandi skriv frá 26. august 1997 frá Vinnumálastýrinum:

"Tann 3. august 1977 varð ein bólkur niðursettur at koma við uppskoti til broytingar í ferðslulógini. Bólkurin varð samansettur av umboðum fyri Landsskrivstovuna, Bileftirlitið, Ráðið fyri Ferðslutrygd, landsverkfrøðingintin og fútanum sum formanni. Í november mánaði í 1995 legði nevndin fram uppskot "Endeligt udkast til ændring af færdselsloven".

Uppskotið varð ikki lagt fram í løgtinginum - eina mest orsakað av at lógartekstarin ikki varð føroyskaður. Fútin, ið hevur verið formaður í nevndini øll árini, hevði í juli mánaði 1997 fund við landsstýrismannin. Landsstýrismaðurin ynskti, at nevndin skuldi halda áfram við arbeiðinum, soleiðis at eitt endaligt uppskot kundi fyrileggjast løgtinginum í ár. Fyri at rokka hesum máli verður nevndin framyvir soleiðis samansett:

Umboð fyri løgregluna
-

M. Nepper-Christensen, formaður
Finn Ougaard

-	Uni Vestureið
Umboð fyri Ráðnum fyri Ferðslutrygd	Jón Kragesteen
Umboð fyri Føroya Politistafelag	Jákup-Alberg Berg
Umboð fyri koyrilæraraarnar	Johan Beder
2 umboð frá landsverkfrøðinginum	Jógvan Nolsøe & Finnleif Durhuus
2 umboð fyri Vinnumálastýrið	Arne Poulsen &
	Høgni í Stórustovu, skrivari

Við hesum vónar stýrið, at nevndin við stoði í hjálagda "Endeligt udkast til ændringer af færdselsloven" frá nov. 1995 og innan karmarnar í arbeiðssetninginum fer at gera uppskot til broytingar í ferðslulógini."

Gjørt verður vart við, at tað er eitt mistak, at eitt umboð fyri Bileftirlitið ikki er nevnt sum nevndarlimur. Jákup Jacobsen stjóri á Bileftirlitinum er limur í nevndini.

Tað í skrivinum nevnda kommissorium er orðað soleiðis:

"Arbeiðssetningur hjá nevndini, ið skal gera uppskot til broytingar í ferðslulógini
Tað fyriliggur eitt endaligt uppskot frá 30. november 1995 til broytingar í ferðslulógini, ið ein 5-manna nevnd hevur lagt fram.

Nevndin hevur sum tær týdningarmestu broytingarnar sett fram uppskot viðvíkjandi:
- hámarksferð
- lyktaføring
- trygdarútgerð
- broyting af revsireglunum
- ásetan av reglum um í serligum førum at kunna leggja hald á akfar. treytað frákenning af koyrikorti í serligum førum, endurvinnan av føraraætti í sambond við viðgerð fyri rúsdrekkamisnýtslu.

Landsstýrismaðurin í ferðslumálum hevur avgjørt, at arbeiði nevndarinnar skal byggja á verandi uppskot.

Harumframt skal nevndin arbeiða við hesum spurningum:
- lækking av promillumarkinum
- koyring og mobiltelefon
- broytt altjóða heilsukrøv til útvegan og endurnýggjan av koyrikorti
- EU-knallert

Til fyrsta fundin verða limirnir bidnir um at lesa og seta set inn í hjálagda avrit av "Endeligt udkast til ændringer af færdselsloven" frá nov. 1995."

Nevndin hevði sín fyrsta fund tann 2. oktober 1997.

Sámal Petur í Grund, landsstýrismaður, luttók á einum fundi hjá nevndini. Orsøkin til hetta var, at tað var ein ávís ósemja í nevndini um innihaldið av ásetingunum um frádøming av føraraættinum, hvussu víðkað økið til nýtslu av treytaðari frádøming.

Meirlutin av limunum eru av tí fatan, at ásetingarnar so vít gjørligt skulu tilevnast í samsvar við tær tilsvarandi ásetingarnar í donsku ferðslulógini. Við hesum fest, at praksis hjá danska Hægstarætti kann nýtast beinleiðis til føroyskar umstøður, og slepst soleiðis undan at byggja upp ein serligan føroyskan praksis. Hetta hevði verið sera trupult fyri bæði dómstólarnar og ákæruvaldið. Ein harmonisering við danska ferðslulóggávu hevur hartil, at frádøming av føraraættinum samsvarar betur við ta ferðslulóggávu, sum er galdandi í Føroyum, enn hon hevði verið, um hon bert hevði verið grundað á føroyskar umstøður. Hartil kann eisini nevnast, at ein frádøming, sum bert er galdandi í Føroyum, kann vera ein fyrimunur fyri ferðandi fólk, sum ofta ferðast til og frá Føroyum, men hetta er ikki galdandi fyri fólk, sum búgva í Føroyum. Harafturat metti meirlutin, at tann fatan hann bar fram var í samsvar við kommissoriið hjá nevndini.

Ein minniluti (2) hevði ta áskoðan at serstakliga viðvíkjandi økinum fyri treytaða frádøming vegna rúsdrekka- og promillukoyring - av fyribyrgjandi orsøkum í ein ávísan tnun kundi verið innsettar (herdar) ásetingar, ið víkja frá teimum tilsvarandi donsku ásetingunum.

Aftaná at landsstýrismaðurin hevði verið á fundinum, hur tey ymsu sjónarmiðini vórðu førd fram, segði landsstýrismaðurin seinni nevndarskrivaranum frá, at hann tók undir við teimum sjónarmiðum, meirilutin hevði sett fram.

Lógaruppskotið er soleiðis tilevnað sambært sjónarmiðum meirilutans.

Sum skjal til lógaruppskotið er hjálagt galdandi ferðslulóg, sum er orðað á føroyskum. Hetta er ein samanskriving av tí upprunnliga lógartekstinum frá 1963 og øllum seinni broytingum.

Við atliti at umhugsingunum um tað hóskandi í at skriva danska tekstin í galdandi lóggávu er harafturat hjálagt eitt yvirlit um ósambærini millum føroyska tekstin og danska tekstin og onnur málslig viðurskifti.

Viðmerkingar til tær einstøku greinirnar í lógaruppskotinum

Til § 1, nr. 1:

Meðan lyktatendringartíðin í galdandi ferðslulóg § 2, VIII, byrjar ½ tíma eftir sólsetur og endar ½ fyri sólarris verður nú skotið upp ferðslutrygdini at fruma ein tíðarvíkan, soleiðis at lyktatendringartíðin byrjar við sólsetur og endar við sólarris. Hinar broytingarnar eru ritstjórnaligar. Koyring í tunli, ið ikki er nóg væl upplýstur, verður at rokna sum koyring í lyktatendringartíð.

Til § 1, nr. 2:

Broytingin er ritstjórnalig og kemur av, at heimildin at skriva út nevndu kunngerðir um seráseting fyri intrættan og útgerð av akførum er flutt frá løgmálaráðharranum til ferðslumálaráðharran.

Til § 1, nr. 3:

Í § 15 í galdandi ferðslulóg er bann móti at føra akfar um førarin vegna sjúku, overving e.a. ikki er førur fyri at føra akfar á tryggan hátt.

Í pkt. 2. og 3. í ásetingini eru sum herðandi umstøður tann støða, har førarin í nevnda skili vinnuligt hevur flutt persónar, og eina sjálvstøðuga meðábyrgd fyri arbeiðsgevara ella annað yvirfólk hjá føraranum, um hesir visti ella áttu at vita, at førarin koyrdi í hesum skili.

Í galdandi ferðslulóg er ikki tilsvarandi áseting viðvíkjandi førarum ávirkaðir av rúsdrekka.

Ásetingarnar í 2. og 3. pkt. eru uttan týdning, tí ásetingarnar í revsilógini um revsiásetan og medvirkan til revsiverd viðurskifti kunnu nýtast í hesum førum. Skotið verður upp at taka ásetingarnar av.

Til § 1, nr. 4:

Í uppskotinum verður tann loyvda alkoholkonsentratiónin í blóðinum við ella aftaná koyring niðurset frá 0.80 o/oo til 0.50 o/oo.

Útlendskar kanningar vísa, at fyri ein meðalbilist við eini promillu uppá 0.50 er vandin fyri óhapp dupult so stórur sum fyri ein bilist uttan alkohol í blóðinum. Harafturat hava kanningar vist, nógv eginleikar eru týðiliga ávirkaði frá 0,50 o/oo - serliga eginleikin at reagera uppá óvæntaðar hendingar og samansettar støður. Hetta er serliga galdandi fyri ungar førarar, men kann broytast nógv frá persóni til persón.

Við støði í hesum hava nógv lond sett promillumarkið niður til 0.50. Í Danmark lendi hetta við lóg nr. 469 frá 10 juni 1997 - tó so at henda niðurseting varð gjørd við kunngerð frá ferðsluráðharranum og kemur í gildi frá 1. mars 1998.

Revsitiltakið við promillukoyring í talstrekkinum 0,51 - 0,80 o/oo verður bert sekt, jbr. § 1, nr. 27 í upp skotinum, (§ 58, stk. 3), meðan tað harumframt og heldur ikki við endurtøku skal verða frádøming av førararættinum við promillukoyring undir 0,81 o/oo, uttan so at tað í sambond við koyringina eru gjørd so álvarslig koyrimistøk, at hesi verða roknað sum herðandi umstøður.

Sambært galdandi rættarsiði við ásetan av sekt fyri promillukoyring millum 1,21 og 2,00 uttan herðandi umstøður verður sektin sett eftir inntøku, soleiðis at sektin verður sett til 1.000 kr. pr. 25.000 kr. árliga brutto-inntøku. Ætlanin við hesi sektarásetan er, at sektin so vítt møguligt skal svara til eina mánaðarløn aftaná skatt fyri persónar við vanligum frádráttum (ein nettománaðarløn). Minsta sekt er 1.000 kr., og hægsta sekt er sambært higartil galdandi rættarsiði roknað at vera 40.000 kr - kanska nakað hægri í dag.

Við atliti at ásetan av sektini fyri promillukoyring við eini promillu millum 0,51 og 0,80 verður mett, at ein føst sektarupphædd uppá 4.000 kr. sum grundarlag hevði verið hóskandi. Galdandi reglurnar fyri endurtøkuárin fyri revsingina, jbr. § 58 í ferðslulógini, verða eisini skotnar upp til nýtslu fyri promillukoyring í talstrekkinum 0,51 og 0,80. Vanligu reglurnar fyri sektarlækking kunnu eisini nýtast.

Viðvíkjandi endurtøkuárinið á revsingina fyri fyrstu ferð koyring við eini promillu millum 0,51 og 0,80 er eisini tann vanliga reglan um endurtøku í § 81, stk. 3 í revsilógini, har sektarrevsingin hevur endurtøkuárin í 5 ár frá tí degi endaligur dómur er fallin ella sektin góðtikin.

Í niðanfyristandandi yvirliti eru tey revsitiltøk, sum sambært lógaruppskotinum at landi verða dømd við promillukoyring í talstrekkinum millum 0,51 og 0,80 o/oo. Viðvíkjandi treytaðari frádømingi verur víst til **§ 1, nr. 38 og 40 í lógaruppskotinum.**

0,51 - 0,80 o/oo	**Revsing**	**Frádøming**
1. ferð tilburður:		
a. Uttan herðandi umst.	4.000 kr.	Eingin
b. Við herðandi umst.	5.000 kr.	Treytað
2. ferð tilburður:		
a. Uttan herðandi umst.	5.000 kr.	Eingin
b. Við herðandi umst.	8.000 kr.	Treytað
3. ferð tilburður		
a. Uttan herðandi umst.	10 daga hefti	Eingin
b. Við herðandi umst.	14 daga hefti	Treytað
4. ferð tilburður:		
a. Uttan herðandi umst.	14 daga hefti	Eingin
b. Við herðandi umst.	20 daga hefti	Treytað

Viðmerkingar nevndarinnar eru í samsvar við viðmerkingarnar til danska lógaruppskotið, har skotið verður upp, at loyvda alkoholkonsentratiónin í blóðinum undir ella aftaná koyringina verður lækkað frá 0,80 o/oo til 0,50 o/oo.

Til § 1, nr. 5:
Uppskotið er eitt vanligt beinleiðis bann fyri førarar av akfari at nýta mobiltelefonir ið verða hildnar í

hondini, undir koyring. Bannið umfatar førarar av einum og hvørjum akfari, jbr. við hetta greiningina av akfari í § 2 II í ferðslulógini.

Ætlanin er at ásetingin skal hava hóskandi langa tíð um at koma í gildi, soleiðis at trafikantarnir fáa hevi til at keypa og áseta útgerð, ið kann nýtast uttan hendur. Tí verður skotið upp at bannið ikki kemur í gildi fyrr enn 1. januar 1999, jbr. **§ 3 í lógaruppskotinum.**

Harafturat verður skotið upp at gera eina áseting, ið heimilar landsstýrismanninum at gera nærri reglur um nýtslu av teleútgerð og líknandi undir koyring. Við hesum verður tryggjað, at fylgjandi tí teknologisku menningini kunnu reglur gerast um nýtslu av slíkari útgerð, ið fer at vísa seg neyðuga við atliti at ferðslutryggleikan.

Í galdandi ferðslulóg eru ongar ásetingar, ið beinleiðis regulera nýtslu av mobiltelefon undir koyring.

Tó vil nýtsla kunna konta undir ásetingina í § 23 í ferðslulógini, sambært hvørji trafikantar skulu vera umhugsnir og ansnir, soleiðis at onnur ikki koma í vanda ella fáa skaða ella ampast. Brot á hesa áseting, ið slendst av nýtslu av mobiltelefon undir koyring kann sektast við bót. Um persónskaði hendir í tí konkretu støðuni, kunnu ásetingarnar í revsilógini um óviljað manndráp nýtast.

Tó er ikki heimild í galdandi lóggávu at banna alla nýtslu av hondhildnum mobiltelefonum, tá koyrt verður.

Fleiri europeisk lond hava gjørt lógarsetlar skipanir í samband við nýtslu av mobiltelefonum, tá koyrt verður. Nógv lond umhugsa at seta bann fyri hondhildnum mobiltelefonum, tá koyrt verður.

Í juni 1996 almannakunngjørdi danska "Rådet for Trafiksikkerhedsforsikring" eitt álit um nýtslu av mobiltelefon, tá koyrt verður.

Í álitinum sæst m.a., at ikki er prógvað, at nýtsla av hondhildnum mobiltelefonum, tá koyrt verður hava havt við sær ferðsluóhapp, men fleiri granskingarúrslit benda á, at koyringin verður minni trygg, og at reaktiónstíðin hjá føraranum verður longri.

Danska "Færdselskommission" hevur í einum umsavni til álitið hjá ráðnum m.a. viðmerkt, at ein samd kommissión heldur, at nýtsla av hondhildnum mobiltelefonum, tá koyrt verður, minkar um konsentratiónina um ferðsluna hjá føraranum, serliga tá telefonin verður nýtt har nógv ferðsla er, og viðmælir, at førarar, ið ætla at nýta mobiltelefon tá koyrt verður, fáa handfría tænastu setta.

Ein meirluti av kommissiónini metir at tá umhugsað verður eitt møguligt bann fyri hondhildnum mobiltelefonum tá koyrt verður, eigur eisini at verða tikið við í umhugsanini onnur viðurskifti, ið gera bilistar minni konsentreraðir í ferðsluni, og sum um so verður, skulu umhugsast at bannast fyri seg - t.d. at tendra radio, kassettuspælarar, tendra og roykja tubakk o.s.fr.

Við atliti til at tað ikki er prógvað, at mobiltelefonir hava eina negativa ávirkan á ferðsluóhapp, og til tær positivu umstøðurnar av nýtslu av mobiltelefonum í bilum - m.a. frálogdan um rúsdrekkakoyring og biltjóvar og ferðsluóhapp o.s.fr. - heldur meirlutin av "kommissiónini" ikki, at tann kann viðmæla ein lógarúrskurð móti nýtslu av hondhildnum mobiltelefonum meðan koyrt verður.

Eitt bann móti nýtslu av hondhildnum mobiltelefonum tá koyrt verður vard sett í danska ferðslulógina við lóg nr. 468 frá 10. juni 1997 við gildiskomu tann 1. juli 1998.

Í viðmerkingunum til lógaruppskotið verður m.a. sagt, at tað ikki er prógvað, at nýtsla av hondhildnum mobiltelefonum tá koyrt verður minka um konsentratiónina um ferðsluna hjá føraranum, at ein samd

"færdselskommission" hevur viðmælt, at førarar, ið ætla at nýta mobiltelefon tá koyrt verður, fáa ísett hondfría útgerð, at uppskotið ikki er eitt vanligt bann fyri at tosa í mobiltelefon tá koyrt verður, men eitt bann fyri føraran ímóti tí vandaligu nýtslu av hondhildnum mobiltelefonum, og at eitt bann fyri nýtslu av hondhildnum mobiltelefonum ikki neyðturvuliga ger tað verri fyri løgreglunni at fáa upplýsing um ferðsluvanlukkur og fráboðanir um lógarbrot, um innsett verður útgerð ið hevur við sær hondfría nýtslu, at tað framhaldandi verður møguligt - t.d. við at koyra inn til viks - at ringja.

Nevndin vísir til hesar viðmerkingar.

Til § 1, nr. 6-8:
Í kommissoriið nevndin hevur, er ein umhugsan av spurninginum um at seta í gildi í Føroyum altjóða reglurnar um heilsutreytir fyri at fáa og at endurnýggja koyrikort.

Nevndin er av tí áskoðan, at hesar ásetingar eiga at galda í Føroyum. Nevndin leggur dent á, at hesar harðari treytirnar fyri at fáa koyrikort og endurnýggja koyrikort fremur ferðsluhryggleikan, og at tað ætlandi er ein treyt fyri, at umheimurin framhaldandi viðurkennir føroyska koyrikortið, at Føroyar láta hesi altjóða fyrisett mát. Sama er galdandi viðvíkjandi ásetingunum um koyriúbúgving og koyriroynd.

Ásetingar av slíkum slagi verða gjørdar umsitingarliga av landsstýrismanninum við kunngerð sambært §§ 18, 18 a-c og 19 í ferðslulógini.

Nevndin hevur sett ein arbeiðsbólk, ið hevur til uppgávu at tilevna eitt uppskot til nýggja koyrikortkunngerð.

Altjóða ásetingarnar um heilsutreytir fyri at lata og endurnýggja koyrikort er við í arbeiðinum hjá arbeiðsbólkinum.

Tá hesar ásetingarnar eru heldur rúgvismiklar og fara í smáfutir skjýtur nevndin upp, at landsstýrismaðurin verður heimilað at avgera, at tær av danska ferðsluráðharranum gjørdu ásetingar um heilsutreytir fyri at fáa og endurnýggja koyrikort, ið eru í samsvar við altjóða reglur, heilt ella lutvíst skulu galda í Føroyum.

Við atliti at, at ásetingarnar í høvuðsheitum venda sær til almennar myndugleikar (Bileftirlitið, landslæknan og heilsustýrið), sum eru avgerandi fyri at hesi kunna dømna um, um ein persónur lykur heilsutreytirnar, verður eisini skotið upp, at ásetingarnar verða undantiknar vanliga kravið um kunngerð av fyriskipanum.

Til § 1, nr. 7-8:
Í kommissoriinum hjá nevndini er ein umhugsan av spurninginum um koyring við "ES-knallert".

Heitið "ES-knallert" stavar frá eini ES-fyriskipan um tvey- og trýhjóladi motorrikin akfør. Fyriskipanin snýr seg m.a. um standardfloksgóðkenning av knallertum. Endamálið við fyriskipanini er at taka burtur forðingar fyri samhandli við hesum akføruni.

Útgreiningin av eini knallert, sum stendur í fyriskipanini, var ikki í samsvar við útgreiningina í tí tá galdandi donsku ferðslulógini - svarandi til § 2 III A e) í føroysku ferðslulógini - tí fyriskipanin loyvir knallertir við eini konstruktivt settari maksimalferð uppá 45 km/t.

Við lóg nr. 98 frá 9. februar 1994 varð knallertútgreiningin í donsku ferðslulógini broytt. Nú verður sundurgreinað millum "gamlar knallertur" og "ES knallertur". Fyri tær gomlu knallertirnar galda enn tær ásetingar, sum vóru í gildi innan lógarbroytingina. Viðvíkjandi ES-knallertum er m.a. galdandi, at tær eru skráseitingarskyldugar, og at tær bert kunnu koyrast av persónum, ið hava koyrikort til bil ella motorsúkklu.

ES-knallertir eru tiknar í nýtslu í Føroyum. Sambært galdandi ferðslulóg eru tær pr. definitión motorsúkklur og kunnu bert koyrast av persónum, ið hava koyrikort til motorsúkklu.

Viðvíkjandi skráseting gjaldi er ásett við løgtingslóg nr. 38 frá 20. mai 1996, at ES-knallertir (motorsúkkla við slagvolumen uppá ikki yvir 50 cm 3) rindar 10% í virðisgjaldi, meðan motorsúkklur við størri slagvolumen rinda 100% í virðisgjaldi.

Nevndin metir, at ES-knallertir framhaldandi eiga at viðgerast sum motorsúkklur, og at ásetingarnar, ið eru galdandi fyri knallertar jbr. útgreining (§ 2 III A c) eiga at varðveitast.

Hetta hevur við sær, at førarar av knallertum sambært galdandi ásetingum ikki skulu hava neriligt koyrikort, men eitt serstakt knallertkoyrikort, ið kann útskrivast til persónar, ið eru fyltir 16 ár og lúka tey fyri onnur motorrikin akfør galdandi heilsukrøv fyri at fáa koyrikort. Haraftrat er tað ein treyt, at viðkomandi í eini roynd váttar at hann hevur nóg mikið av koyridugnaleika og neyðugan kunnleika til akferið og viðgerð tess og til ferðslureglurnar. Tað er ikki ein treyt at viðkomandi skal hava fingið undirvísing hjá koyrilærara. Víst verður til § 18, stk. 3 og stk. 8 í ferðslulógini.

Fyri førarar av ES-knallertum hevur hetta við sær, at teir skulu vera fyltir 18 ár og skulu hava koyrikort.

Nevndin metir tó, at kravið um koyrikort kann gangast á møti við at viðkomandi hevur koyrikort til bil ella motorsúkklu.

Niðanfyri standandi kann takast fram sum orsøk til kravið um veruligt koyrikort til førarar av ES-knallert:

- Tann økti vandin við koyring við einum skjóttkoyrandi akfari verður minni, um førarin við koyriundirvísing verður skúlaður til at vera ábyrgdarfullur og umhyggin trafikantur
- Tann teoretiska og praktiska royndin við útvegan av koyrikorti til bil ella motorsúkklu setur muhandi størri krøv til umsøkjaran enn hin meira summariska royndin við útvegan av koyrikorti til knallert.
- I fjølbygdum økjum har hámarksferðin er 50 km/t, koyrir ein ES-knallert, ið kann koyra 45 km/t, stórt sæð sum bilur ella motorsúkkla.
- Møguleikin at kunna frádømast koyrikortið, sum ikki er galdandi fyri knallertførarar, kann virka sum fyrivarni við atliti at forða rúsdrekka- ella promillukoyring.

Við uppskotinum, at ES-knallertir kunnu førast av persónum, ið hava koyrikort til bil, hevur nevndin lagt dent á, at tað ikki er neyðugt at seta somu krøv viðvíkjandi koyridugnaleika, sum verða sett við koyring við teimum sera skjóttkoyrandi motorsúkklunum, og at uppskotið er í samsvar við donsku ásetingarnar.

Til § 1, nr. 9-14:
Tær uppskotnu broytingarnar eru lutvís ein avleiðing av **§ 1, nr. 38 og 40 í lógaruppskotinum** um treytaða frádøming af førararættindum. Víst verður til hetta og til viðmerkingarnar til hetta uppskot.

Til § 1, nr. 10:
Heitið "leiðbeinandi koyriroynd" hevur higartil verið nýtt sum heiti fyri ta koyriroynd, ið verður tikin sum eitt eftirlit av koyridugnaleikanum hjá føraranum í samband við eini frádøming av førararættindum.

Av tí at førarin av røttum kennir ta orienterandi royndina sum eitt eftirlitstiltak, verður skotið upp at broyta heitið til "eftiransandi koyriroynd".

Til § 1, nr. 9 og 11:
Sambært galdandi ásetingum er tað ein treyt fyri at fáa førararættin aftur aftaná treytaleysa frádøming, at umsøkjarin klárar eina leiðbeinandi koyriroynd. Henda koyriroynd er ein teoretisk og praktisk roynd og verður tikin eftir somu reglum sum ein vanlig koyriroynd. Undanfarandi koyriundirvísing verður ikki krevd í samband við tilmæli til leiðbeinandi koyriroynd.

Sambært lógaruppskotinum verður møguligt at áseta sum krav, at aftarvinning av førararættinum aftaná treytaleysa frádøming vegna rúsdrekka- ella promillukoyring verður treytað av, at umsøkjarin áðrenn hann fer upp til eftirfylgjandi koyriroynd endurtekur koyriundirvísing, sum fevnir um alkohol og ferðslu.

Til § 1, nr. 12:
Broytingin kemur av uppskotinum um at innseta eitt krav um at endurtikin koyriundirvísing áðrenn eftirfylgjandi koyriroyndina verður tikin av persónum, ið hava fingið frádømt koyrirættin treytaleyst vegna rúsdrekka- ella promillukoyring. Hesir persónar skulu ikki sleppa undan kravinum um koyriundirvísing og eftirfylgjandi koyriroynd, hóast umstøðurnar ið vóru atvoldin til ákæruna, og teir innanfyri tað seinasta árið áðrenn umsóknina um at fáa koyrikortið aftur, hava staðið eina koyriroynd.

Til § 1, nr. 13:
Uppskotið hevur við sær, at persónur, ið hevur fingið frádømt førararættin treytað, innan eina freist, ið verður ásett av løgregluni, skal upp til eina eftirfylgjandi koyriroynd. Verður royndin ikki staðin, ella um viðkomandi ikki medvirkar til royndina, verður førararætturin tikin.

Við hesum verður tryggjað, at viðkomandi, hvørs misbrot umframt sekt bert verður staðfest sum treytað frádøming av førararættinum, hevur nóg mikið av kunnleika til ferðslureglurnar og nóg mikið av koyridugnaleika.

Til § 1, nr. 14:
Við lógaruppskotinum fær landsstýrismaðurin heimild at gera nærri ásetingar um innihaldið av tí koyriundirvísing, sum sambært **§ 1, nr. 11** í uppskotinum er ein treyt fyri at fáa koyrikortið aftur aftaná treytaleysa førararættarfrádøming aftaná rúsdrekka- ella promillukoyring, og um tann eftirfylgjandi royndin, fróknað missa av førararætti, og um gjald fyri royndina.

§ 1, nr. 11 og 12 kemur í gildi eftir **§ 3** í **lógaruppskotinum** sambært áseting landsstýrismansins. Ørsøkin til hetta er, at tað við kunngerð skulu gerast nærri ásetingar um innihaldið av tí nýggju koyriundirvísingini í samband við at fáa aftur førararættin aftaná eina treytaleysa frádøming av rúsdrekka- ella promillukoyring. Hesar ásetingar verða tiknar við í uppskotið til eina nýggja koyrikortkunngerð, sum ein arbeiðsbólkur undir nevndini tilevnar. Víst verður til viðmerkingarnar til **§ 1, nr. 6** í **lógaruppskotinum.**

Til § 1, nr. 15:
§ 27 í galdandi ferðslulóg ásetur bann móti at hanga á akførum og móti spæli o.a.

Skotið verður upp at umskriva ásetingina. Umframt ritstjórnarligar broytingar verður skotið upp, at tað ikki er loyvt at koyra á rullibretti á vegi.

Til § 1, nr. 16:
Vanlig galdandi hámarksferð sæst í § 30 a í ferðslulógini, soleiðis sum hon er orðað við løgtingslóg nr. 66 frá 18. oktober 1978.

Vanligu hámarksferðirnar eru 50 km/t í fjølbygdum økjum og 80 km/t uttanfyri fjølbygt øki.

Sambært § 30 a, stk. 2, er møguleiki fyri at áseta eina lægri hámarksferð á einum vegastrekki, har tað ikki er forsvarligt ella ynskiligt at loyva ferðslu við ferð, ið svarar til ta vanligu hámarksferðina. Trygdarlig ella umhvørvislig fyrilit kunnu vera orsøk til lægri hámarksferð.

Við uppskotsins broytingini verður eisini møguligt at lata hetta galda fyri eitt nærri avmarkað øki í fjølbygdum øki.

Til § 1, nr. 17:
Uppskotna ásetingin er nýggj. Við hesi verður møguligt at seta eitt hægri hámarksferð enn tað vanligu á einum ávísum vegastrekki. Serligar umstøður, herímillum ferðslugreiðsla, kann vera grundgeving fyri hægri hámarksferð. Tað er ein treyt, at avgerandi ferðslutrygdarlig umhugsni ikki eru ímóti hægri hámarksferð.

Ásetingin er bert galdandi fyri løtt akfør, so sum tað sæst í § 1, nr. 18 í lógaruppskotinum.

Nevndin metir, at tær ímiliigu vanligu hámarksferðirnar hava góða ávirkan á ferðslutryggleikan.

Nevndin er eisini av tí áskoðan, at eingin ferðslufyrifit beina á eina hækkan av teimum vanligu hámarksferðunum.

Meðan nevndin hevur viðgjørt uppskotið er m.a. ført fram, at vegakervið so við og við er so væl útbygt og bevur fingið so høgan standard - bæði í og uttanfyri fjølbygt øki - at ein sundurgreining av hámarksferðinum á teim einkultu ferðslusløgunum kan vera hóskandi á ávísum vegastrekkjum. Endamálið við hesum er at greiða ferðsluna tryggari. Infrastruktururin við m.a. fleiri ferjulegum ger ofta ferðslumynstrini til ávísar tíðir, har eisini veðrið og goingið kunnu medvirka til minni tryggleika av ampanum frá tungum akførum.

Við at loyva hægri hámarksferð á slíkum strekkjum kunnu tey løttu akførini skilja seg frá teimum tungu akførunum, og soleiðis sleppa undan at royna at yvirhála á minni egnaðum strekkjum.

Nýtslan av møguleikanum sambært ásetingini væntast at gera møguleika fyri fursvarligum yvirhálingum á vegatekniskt forsvarligum strekkjum við einum hámarksferðinnni til yvirhálaða akferið uppá t.d. 20 km/t.

Í fjølbygdum økjum krevst fyrilit til nógv fleiri faktorar enn uttanfyri fjølbygt øki. Tí er ikki ráðiligt at loyva teimum tungu akførunum "at fylgja við" upp til akfarsásettu hámarksferðina. Ei slíkur møguleiki hevði verið medvirkandi til eina hækkan av vanligu hámarksferðini í fjølbygdum øki, og ikki hevði heldur borið til at sundurgreina ferðina.

Umboðini fyri landsverkfrøðingin í nevndini eru av tí áskoðan, at sum nú er er tað ivasamt, um ásetingin fer at kunna nýtast á nøkrum nýtsluøki, og ynskir at gera eitt skrivligt ummæli til spurningin.

Hetta ummæli finst í skrivi frá 28. januar 1998 frá landsverkfrøðinginum. Innihaldið í skrivinum lýsir í nógvum førum tey sjónarmið, ið hava verið førd fram í nevndini.

Skrivið er soljóðandi:

"Endurskoðan av ferðslulógini
Uppskot til broytingar í §§ 30a og 30b.
Viðmerkingar

Ferðslutógin ásetir í § 30a, stk. 1, hægsta mark fyri ferð:
1) á fjølbygdum øki: 50 km/t og
2) uttan fyri fjølbygt øki: 80 km/t.

Í stk. 2 verður heimilað at áseta lægri ferðmark á vegastrekki, har tað ikke er ráðiligt ella ynskiligt at loyva akstur við ferð upp til vanligt hægstamark.

Í § 30b, stk. 1, verður ásett mesta ferð hjá ymiskum akfaraslagum, og í stk. 2 verður heimilað at ásetu lægri ferðmark fyri ávíst motorakfar, meðan stk. 3 gevur heimild at loyva hægri mark fyri ferð hjá teimum í stk. 1 nevndu akfaraslagum, tó ikki omanfyri tey í § 30a, stk. 1, ásettu hægstumork uppá 50 km/t og 80 km/t ávíkavist á fjølbygdum øki og uttanfyri fjølbygd øki.

Undir viðgerðini í nevndini til endurskoðan av ferðslulógini eru uppskot komin um á ávísum vegastrekkjum, har ferðslu- og trygdarviðurskifti ella koyriteknískar grundir ikki tala ímóti hesum, at loyva hægri ferðmørk enn tey í § 30a, stk. 1, ásettu 50 og 80 km/t. Talan hevur verið um at kunna loyva upp til 60 km/t á fjølbygdum øki og 90 km/t uttan fyri fjølbygd øki, tó bert fyri persónbilar.

Sum grundgeving fyri at loyva hesum hækkingum verður framført, at tað eru vegastrekki, har hetta letur seg vel gera, og at tað hevði gjørt tað lættari hjá tí løttu ferðsluni at koyra fram um tunga ferðslu og harvið verið við til at givið smidligari avgreiðslu av ferðsluni. Eisini hevði sloppist undan tí forargilsinum, tað oftani er at skula noydast at "hanga" aftanfyri tungum akfari og í vátveðri verða spruttað til av tí, sum koyrir framumanfyri. Tíðarsparing hevur eisini verið nevnd, men her skal havast í huga, at tað longsta samanhangandi strekki, sum talan kann verða um at skula loyva 90 km/t, er hægst 15 km (frá Kjalnestanga norður til Streymnes), og hesar 15 km tekur tað góðar 11 min. at koyra við 80 km/t og 10 min. við 90 km/t.

Afturat tí, at hækkað ferðmørk føra lítla ella onga tíðarsparing við sær, kann verða nevnt, at í londum á okkara leiðum, har vegakervi og ferðslumynstur kunnu samanberast við okkara, tykist tíkið vera heldur at fáa ferðina setta niður úti frá teirri sannroynd, at lægri ferð førir til færri og minni álvarsom ferðsluóhapp enn hægri ferð.

Síggjast má í eyguni, at sjálvt um ferðmarkið millum bygdir, sum nú er, er 80 km/t, so fara fram framumkoyringar av akførum, sum koyra við mest loyvdu ferð, og tann, sum koyrir framum, hevur tí eina ferð uppá einar 95 km/t. Vandi er fyri, at um loyvda markið verður sett upp til 90 km/t, fer meginparturin av ferðsluni bert at koyra 10 km/t skjótari enn nú á hesum ávísu strekkjunum, og tann, sum tá skal framum, kemur at koyra við ferð omanfyri 100 km/t. Hugsað verður eisini um, at tað kann fara at vísa seg trupult at fáa markini millum 90 km/t og 80 km/t yvirhildin, soleiðis at skilja, at kemur tú t.d. koyrandi úr rundkoyringini í Kollfjarðardali, kann tú koma upp, um tað nú er 80 ella 90 km/t ferðmark, sum er galdandi. Her og kanska aðrastaðni eisini er tí hugsandi, at bilførarar fara at halda, at her er nokk loyvt at koyra við 90 km/t.

Hægri ferðmark krevur endurskoðan av vegamerkingunum á avvarðandi vegastrekkjum, nýggjar sýnismátingar - nevnast kann, at framumkoyringarsynislongdin veksur úr 240 upp í 290 m, altso o.u. 21% - og harav broyttar merkingar á vegin, nýggj ferðamarksskelti og avtøkur av hesum, og nýggjar metingar um tryggleikan í fibindingunum - ein ákoyring við 90 km/t er 26% harðari enn ein við 80 km/t. Ein samanstoytur millum tveir bilar, sum báðir koyra 90 km/t er meira enn 60% harðari, enn um báðir koyrdu 80 km/t.

Nevndu og onnur vandamál hildin upp ímóti nøkrum óttaskiligum fyrimunum hava ført til, at bidani verður rátt frá at loyva hægri ferðmark enn tey, sum í dag eru ásett sum hægst loyvdu ferðmørk á og uttan fyri fjølbygd øki."

At nýta hesa ásetting krevur semju millum vegamyndugleikarnar og løgregluna, tó so at málið kann leggjast fyri landsstýrismaðurin til avgerð, jbr. § 47 í ferðslulógini.

Til § 1, nr. 18:
Í § 30 h í galdandi ferðslulóg, sum er orðað við løgtingslóg nr. 66 frá 18. oktober 1978, eru hesar ferðaavmarkingar ásettar fyri serlig slóg av akførum:

1) bussur, hvørs loyvda totalvekt fer uppum 3.500 kg: **70 km/t**
2) motorvognur, hvørs loyvda totalvekt fer uppum 3.500 kg: **60 km/t**
3) motorvognur við leysavogni ella skrásettum viðfestum reiðskapi, herundir húsvogni: **50 km/t.**
4) motorvognur við øðrum viðfestum reiðskapi, traktorur og motorreiðskapi: **30 km/t**
5) motorrikið akfar ella vognarað, har eitt ella fleiri hjólpør hava massivan hjólklædning: **15 km/t.**

Hesar serligu aksfarsásettu hámarksferðir galda yvir hægri generellum og staðligum hámarksferðum sambært § 30 a.

Uppskotið hevur við sær eina ávísa hækkan av teimum undir 2.3) nevndu hámarksferðum. Orsøkin er partvís, at við atliti at teimum tekniska krøvunum, ið seu verda við atliti at stabiliteti og brensum á akfarinum, er ferðslutryggleikaligt forsvarligt við hægri ferð fyri hesi akfør, partvís at fleiri akfarsásett hámørk kunnu gera ferðsluvandaligar umstøður vegna yvirhálingar av akførum, ið kunnu koyra við hægri ferð.

Uppskotnu ferðsluhámørkini í tí broytti ordingini í **§ 30 b, stk. 1-3** eru hesi:

1) Bussar hvørs loyvda totalvekt fer upp um 3.500 kg: **70 km/t** uttanfyri fjølbygt øki, **50 km/t** í fjølbygdum øki, hóast hámarksferðin staðliga er hægri.
2) Onnur akfør hvørs loyvda totalvekt fer upp um 3.500 kg (lastbilar) og vogarøð av einum lastbili ella bussi hvørs loyvda totalvekt fer upp um 3.500 kg, og eitt skrásetingarskyldugt viðfest akfar: **70 km/t** uttanfyri fjølbygt øki, **50 km/t** í fjølbygdum øki, hóast tað er ein staðlig hægri hámarksferð.
3) Akfør við eini loyvdari total vekt uppá ikki yvir 3.500 kg við viðfestum vogni, leysavogni ella skrásetingarskyldigum viðfestum akfari, íroknað húsvogni: uttanfyri fjølbygt øki **70 km/t**, í fjølbygdum øki **50 km/t** ella ein møgulig staðlig hægri hámarksferð.

§ 30 b, stk. 4-7, í lógaruppskotinum svarar til § 30 b, stk. 4-7 í galdandi ferðslulóg.

Sambært uppskotinum verða bussar og lastbilar líkasettir, soleiðis at akfarsásetta hámarksferðin fyri bæði sløg er 70 km/t. Sambært ummæli frá Bileftirlitinum er eingin tekniskur munur á hesum báðum akførum hvat viðvíkur brensuevnum og støðgilongd. Sambært einum ummæli frá "Rådet for Trafiksikkerhedsforskning" til ferðslumálaráðið er totalrisikoin, t.v.s. tann risiko, sum ein trafikantur í einum ferðslufari leggur á seg sjálvan og onnur, er størstur fyri tey sløg av akfarum, har tað í galdandi ferðslulóg eru gjørdar akfarsásettar hámarksferðir. Við atliti at hesum, og at annars verður vist til **§ 1, nr. 17 í lógaruppskotinum** metir nevndin, at tann akfarsásetta ferðin fyri bussar og lastbilar ikki eigur at fara upp um 70 km/t, og at tann akfarsásetta ferðin fyri hesi akfør eigur at vera eins.

Til § 1, nr. 19-20:
Sambært § 47, stk. 2 í galdandi ferðslulóg kann landsstýrismaðurin aftaná samráð við vegamyndugleikarnar gera áseting um at útleggja veg til høvuðsveg. At ein vegur er útlagdur sum høvuðsvegur verður víst á talvu B 16, jbr. Vegamerkingarkunngerðin.

Av ferðslutrygdarávum er parkering á ávísum landsvegum uttanfyri fjølbygt øki óynskt.

Tí verður skotið upp í § 33 a, stk. 2 í ferðslulógini, sum inniheldur fleiri parkeringsforbod, at gera eina áseting um forbod at parkera á koyribreytini á høvuðsvegi uttanfyri fjølbygt øki.

Til § 1, nr. 21-22:
Sambært galdandi reglum í § 43, stk. 3 í ferðslulógini skal tá koyrt verður við motorsúkklu uttanfyri lyktatendringartíðina nýtast nærljós (stutt ljós). Ein samsvarandi treyt er ikki galdandi tá koyrt verður við bili ella øðrum motorriknum akførum, men nýtsla av nærljósum ella serligum koyriljósum uttanfyri lyktatendringartíðina er tó loyvd. tá koyrt verður við bili.

Í álitinum, ið nevndin legði fram í oktobet 1985 viðvíkjandi uppskoti til broyting av ferðslulógini verður hetta sagt um lyktaføring uttanfyri lyktatendringartíðina:

> " Í løgtingsmáli nr. 31/1983 varð samtykt eitt uppskot, eftir hvørjum landsstýrismanninum varð álagt at broyta kunngerðina um innretlan og útgerð av akførum soleiðis, at bilar innan eina bóskurdi freist skulu hava ísett koyriljós.

Í november 1975 legði Nordisk Trafiksikkerheds Råd fram eina frágreiðing um ávaringarljós fyri motorsúkklur, har niðurstøðan var, at vandin fyri at motorsúklistar komu uppí ferðsluvanlukkur væntandi varð minni um ásett varð, at motorsúkklur altíð skulu hava ljós, og at við koyring uttanfyri lyktatendringartíðina skulu nærljós altíð nýtast.

Í eini tilsvarandi frágreiðing frá 1976 um billjós um dagin verður rátt til at gera eitt heildarboð um lyktaføring alt samdøgnið.

Uppskotna ásetingin í stk. 3 skal metast við støði í hesum. Ein tilsvarandi áseting er gjørd í Danmark - og okkum vitandi - í hinum norðanlondunum.

Viðvíkjandi spurninginum um billjós verður viðmerkt, at í 1977 vórðu í Svøriki givin boð um at nýta koyriljós (ávaringarljós) á bilum ið koyrdi uttanfyri lyktatendringartíðina. Við koyriljós er at skilja serligar framvendandi hvítar lyktir, sum tendra tá tendrilykilin verður settur í koyristøðu. Koyriljósið er sterkari enn støðuljósið, men veikari enn nærljósið. Orsøkin fyri at ásceta nýtslu av koyriljós í staðin fyri nærljós er at nærljós - serliga frá nógvum bilum - kunnu virka blendandi.

Umráðingarnar um møguliga at áseta tilsvarandi boð í Danmark eru steðgaðar fyribils av royndinum um avleiðingarnar av tí svenska boðnum. Ætlanirnar um eitt generelt boð fekk annars mótstøðu í Danmark, m.a. tí eini boð um lyktaføring um dagin fer at virkna ta ávirkan, ið áseting av lyktaføringsboðum fyri motorsúkklur hava í relatión til møguleikan fyri at skilja millum motorsúkklur og knallertir.

Nevndin metir, at spurningurin um billjós um dagin má umhugsast meira og takast við í tær generellu umhugsanirnar viðvíkjandi eini revisión av útgerðarkunngerðini. Viðmerkjast skal eisini, at spurningurin helst ikki kann greiðast í fyrisitingarligum fyriskipanum. Soleiðis kunnu reglur ikki ásetast við fyriskipan um, at akfør, ið longu eru skrásett, skulu hava ísett koyriljós. Somuleiðis tykist tað neyðugt við eini áseting um at akfarið skal hava koyriljós, verður styðjað av eini lógargrein, ið ásetur nýtsluna."

Danska ferðslutrygdarkommissiónin hevur í áliti nr. 1157/1988 skotið upp, at tá koyrt verður við bili skulu koyriljós (nærljós ella serligar koyriljóslyktir) nýtast um dagin. Hervið verða bilarnir meira sjónligir fyri hinum koyrandi og hevur hetta við sær, at tað slepst undan nógvum fleirpartóhappum.

Hetta uppskot er nú framt í Danmark við lóg nr. 401 frá 13. juni 1990 um broyting í ferðslulógini, sum eini boð um nýtslu av nærljósum, tokulyktum ella serligum koyrilyktum fyri bilar uttanfyri lyktatendringartíðina, stuðlað við, at boðini eisini eru galdandi fyri onnur motorrikin akfør, ið eru útgjørd við nærljóslyktum. Traktorar og knallertir eru útgjørdir við nærljóslyktum, og skulu hesar nýtast tá koyrt verður uttanfyri lyktatendringartíðina.

Uppskotna ásetingin **í § 1, nr. 22, - § 35 a** er orðað í samsvar við dutsku ásetingarnar. Í **stk. 2.** er skotið upp, at tær kravdu koyriljósásetingarnar ikki eru galdandi fyri akfør meðan tey verða bygd ella umvæld.

Tann í § 1, nr. 21, uppskotna avtøka av § 35, stk. 4, 3. pkt., og stk. 5, viðvíkja loyvi til í ávísum førum at nýta støðuljós í lyktatendringartíðini. Tá nýtsla av koyriljósum (nærljósum, tokylorlyktum ella serligum koyriljósum) er skotið upp uttanfyri lyktatendringartíðina, verður skotið upp at avtaka hetta loyvi. Støðuljós kunnu hereftir bert nýtast til at marka eitt steðgað ella parkerað akfar.

Til § 1, nr. 23:
Broytingin er rástjórnarlig.

Til § 1, nr. 24:
Í uppskotnu ásetingini er eitt bann móti persónsflyting við húsvogni. Uppskotið bevur stoðí í, at frá einum ferðslutrygdarligum sjónarmiði er vigiligt at loyva persónsflyting við húsvogni. Hetta kemst av, at ferming og vekthýti í húsvoginum er sera avgerandi fyri koyriegiuleikanar hjá einum vognarøði við húsvogni.

Til § 1, nr. 25:
Galdandi ásetingin í § 42 í ferðslulógini um trygdarbelti var sett í lógina við logtingslóg nr. 67 frá 5. juni 1986.

Samhaert galdandi ásetingum er tað skylda at nýta trygdarbelti, tá bilurin er útgjordur við slíkum. Børn undir 15 ár og persónar við lægra likamshædd enn 150 cm. eru ikki fevnd av skylduni at nýta trygdarbelti.

Skotið er upp er at víðka reglurnar munandi um nýtslu av trygdarbelti so tær svara til tær í Danmark galdandi ásetingar, sum í ávísan mun eru gjordar eftir ES-fyriskipanum.

Høvuðsátturnir í uppskotinum eru hesir:

1) Børn eru fevnd av beltiskyldu tá tey eru fylt try ár. Børn ið eru fylt 3 ár, men ikki sjey ár, kunnu í staðin fyri trygdarbelti nýta barnastól. Samsum við trygdarbelti kann selakoddi nýtast. **Stk. 2 í uppskotinum.**
2) Børn undir 3 ár skulu við koyring í bili við í mesta lagi 9 persónum, og í bili við loyvdari vekt uppá í mesta lagi 3.500 kg nýta trygdarbelti, barnastól ella aðra trygdarútgerð tillagað vekt og breidd barnsins. Skyldan at nýta serliga tillagaða trygdarútgerð er ikki galdandi, um barnið situr á baksetrinum, og eingin trygdarútgerð er til taks hjá barninum. **Stk. 3 í uppskotinum.**
3) Tann higartil góðkenda vanliga frítøka fyri selaskyldu við hyruvognskoyring deltur burtur.
4) Førarin skal undir revsidømi ansa eftir, at passagerar, ið ikki eru fyltir 15 ár og sum tí ikki kunna revsast, nýta trygdarútgerð. **Stk. 6 í uppskotinum.**

Samhaert **stk. 5 í uppskotinum** svarandi til § 42, stk. 3, 2. Pkt. og stk. 4, 2 pkt. í galdandi ferðslulóg kann landsstýrið áseta reglur, ið frítaka ávísar persónar fyri skyldunni at nýta trygdarbelti, og reglur, ið frítaka fyri skyldunat at nýta trygdarbelti við serligar koyrihættir.

Galdandi reglurnar um hetta eru ásettar í kunngerð nr. 117 frá 25. november 1986. Skotið verður upp at avtaka hesa kunngerð og gera nýggja kunngerð í staðin. Uppskot er gjort til hesa kunngerð.

Samhaert hesum uppskoti fevnir skyldan at nýta trygdarbelti ikki um persónar, sum við læknaváttan eru fríttiknir. Leiðreglurnar fyri nær læknarnir kunnu veita undantak eru í eini reglugerð frá Sundhedsstyrelsen til læknar um selafrítoku. Váttan um selafrítoku verður givin á serligum oyðublaði, sum skal havast við tá koyrt verður.

Í uppskotinum eru fylgjandi reglur um frítøku fyri selaskyldu við serligar háttir fyri koyring:

1) vinnulig koyring við lágari ferð, har viðkomandi undir koyringini skal inn í og úr bilinum ferð eftir ferð, og strekkið millum stoðgirnar ikki fer upp um 500 m,
2) tá postverkið koyrir í fjølbygdum øki í samband við útbýting av brev- og pakkaposti, og tosman av postkassum.
3) koyring í fjølbygdum øki, tá viðkomandi skal býta út dagblað til haldarar.
4) løgreglukoyring við serligum atliti at eftirsansi, og tá flutir verða handtikin og onnur, ið kunnu vera vandamikil undir koyringini.
5) vinnulig koyring hjá hyruvognsjaførum við passagerum.

Til § 1, nr. 26:
Skotið verður upp at avtaka serásetingar fyri nýtslu hjá motorsúkklandi av nærljósum uttanfyri lyktatendringartíðina sum eitt avleiðing av, at motorsúkklur í framtíðini eru fevndar av vanligu reglum um koyriljós í uppskotinum til eina nýggja **§ 35 a, jbr. nr. 17 í § 1 í lógaruppskotinum.**

Til § 1, nr. 27-28:
Skotið verður upp at umskriva og gera orðingina greiðari fyri revsireglurnar í § 58 í galdandi ferðslulóg.

Til § 1, nr. 27:
Í uppskotinum til eina broytta orðing av § 58 eru revsireglur fyri tey egnaðu (grovu) brotini á ferðslulógina, t.e. **í førum, har revsikarmurin er sekt, hefti ella fongsul í upp til 1 ár.**

Revsireglurnar í uppskotinum samsvara við § 58, stk. 6-7, (rúsdrekkakoyring), stk. 8, (promillukoyring), stk. 9, (koyring hóast sjúku, overvan o.a., koyring uttan koyrikort og rýming frá ferðsluáhappi) og stk. 10, (koyring í frádømingarskeiðnum) **í galdandi ferðslulóg.**

Nevndin hevur umhugsað at broyta revsiásetingina í § 58, stk. 10 í galdandi revsilóg, sum snýr seg um koyring í frádømingarskeiðnum. Revsikarmurin er sum omanfyri nevnt hefti ella fongsul upp til 1 ár, **ella undir serliga linnandi umstøðum sekt.**

Í royndum er revsingin fyri koyring fyrstu ferð í frádømingarskeiðnum hefti í 7 dagar, sjálvt um tað við frádømingina varð givin sektar- ella frælsisrevsing. Við fyrstu endurtøku er revsingin hefti í 14 dagar. Revsingin fyri enn fleiri endurtøkur er sambært rættarsið javnt veksandi upp til fongsul í 60 dagar - 3 mánaðar alt eftir, hvussu nógvar revsingar eru frammanundan. Soleiðis verður revsingin vanliga ásett til 20 daga hefti, 30 daga hefti, 40 daga fongsul, 50 daga fongsul og 60 daga fongsul við 3., 4., 5., 6. og 7. endurtøku. Nevndu revsistig eru galdandi, har bert ein einkultur tilburður av koyring er í frádømingarskeiðnum. Um fleiri koyritilburðir eru til dóms í senn, verður revsingin vanliga hækkað.

Nevndin hevur umhugsað, um tað er rímiligt og forsvarligt at broyta revsiásetingina soleiðis, at tað við fyrstu ferð koyritilburðir í frádømingarskeiðnum verður givin sektarrevsing í staðin fyri stutta frælsisrevsing.

Somu umhugsanir hava havt við sær eina broyting í donsku ferðslulógini, soleiðis at fyrstu ferð mistøk verða revsað við sekt. Hetta varð gjørt við lóg nr. 396 frá 13. juni 1990. Ætlanin við hesi broyting var bert at broyta revsingina við fyrstu ferð mistøk. Annars var tann higartil nýtta revsimátingin varðveitt. Somuleiðis vóru ongar broytingar í revsimátingini í málum, har koyring í frádømingarskeiðnum bendi í samband við nýggja rúsdrekka- ella promillukoyring. Sektin í fyrstu ferð tilburðum svarar til sektina í málum um fyrstu ferð tilburðir av rúsdrekka- og promillukoyring. Um fleiri koyringar eru í fyrstu ferð tilburði til dóms í senn, verður sektin hækkað.

Triggir av nevndarlimunum (umboðið fyri Ráðið fyri Ferðslutrygd og teir 2 løgreglulærdu limirnir) meta tað ikki forsvarligt at broyta revsiásetingina fyri hesar fyrstu ferð tilburðir. Serliga vísa teir á, at sterk fyribyrgjandi árin eru knýtt at at geva frælsisrevsing fyri hesi misbrot, og at sektarrevsing fer at vikna nógv um fyribyrgjandi árini av reaktiónsskipanini. Meirilutin segði eisini, at tað er ein náttúrlig avleiðing af tí gradueraðu, pedagogisku reaktiónsskipanini, sum lógaruppskotið leggur upp til við møguleika fyri treytaðari frádøming fyri minni álvarsom misbrot, at ein persónur, ið ger eitt so álvarsamt misbrot, at førararættarin skal frádømast treytaleyst, fær frælsisrevsing, um hann koyrir í frádømingarskeiðnum.

Tveir av nevndarliminum (formaðurin og varafútin) hildu, at frælsisrevsing skuldi nýtast minst møguligt, at ein stutt frælsisrevsing neyvan gjørdi størri mun, at ein sekt til støddar sum nevnda fór ikki at hava við sær órímiliga viknan av fyribyrgjandi árinini av reaktiónsskipanini, og at at nýta sektarrevsing fyri hesi misbrot fór at lætta væl um rættarmálini, tá flestu mál kunnu tá avgreiðast við sektarviðtøku uttanum rættin.

Hinir nevndartimirnir meta seg ikki kunna taka støðu til málið.

Lógaruppskotið er hervið tilevnað samhært meirilutans áskoðan.

Áskoðan uttinnilutans til orðingina av § 58, stk. 5 hevði verið:

"Tann ið koyrir motorrikið akfat, sum krevur koyrikort at koyra, hóast rætturin til at vera ella fara at vera førari av slíkum akfari er treytaleyst frádømdur viðkomandi, verður revsaður við sekt. Við endurtøku kann revsingin hækka til hefti ella fongsul í 1 ár."

Til § 1, nr. 28:
Flestu brotini á ferðslulógina kunnu bert revsast við sekt.

Í uppskotinum til nýggja § 58 a eru tær ásetingar, ið verða revsaðar við sekt, í samsvar við nýggjari lóggávuteknikk, uppreksaðar, **stk. 1, nr. 1.**

Stk. 1, nr. 2-4, samsvarar - undantikið hesa broyting - við galdandi § 58, stk. 1, nr. 3.

Stk. 4-7, samsvarar við galdandi § 58, stk. 2-4, tó við broytingini, at ásetingarnar í stk. 7 um objektiva vinnefelagsábyrgd eru viðkaðar til eisini at fevna um kommunur og kommunalar felagsskapir.

Stk. 2-3, eru nýggjar ásetingar í samsvar við ásetingarnar í donsku ferðslulógini, ið er framdar við lóg nr. 283 frá 29. apríl 1992.

Meðan stk. 1 tiskilar eitt "normalsektarøki", hevur **stk 2-3** ásetingar um herda sekt fyri ávís brot á lógina.

"Normalsektarøkið" fevnir um tær í **stk. 1** uppreksuðu ásetingar undantikið tær ásetingar, ið eru gjørdar í **stk. 2-3.**

Stk. 2 fevnir um eitt øki har herd sekt skal gevast, og fevnir um tey brot, ið mugu roknast eyðkend ferðsluhættislig. Sjálvt hugtakið "herd sekt" er ikki gjørt greitt í lógaruppskotinum. Av viðmerkingunum til uppskotið ið bygt varð á, at gera samsvarandi ásetingar í donsku ferðslulógina, sæst, at miðað er ímóti eini hækking av galdandi sektarlagi við umk. 50 %.

Lógaruppskotið miðar ímóti samsvarandi hækking av sektarlagnum í Føroyum fyri tey í **stk. 2** nevndu eyðkend ferðsluhættislig brot.

Stk. 3, miðar bæði ímóti eini umskipan og eini herðing av sektarútrokningini fyri brot á hámarksferð viðvíkjandi brot á vanlig hámarksmørk, staðlig hátnarksmørk og akfarsásett hámarksmørk.

Eins og í **stk. 2** er hugtakið "herd sekt" ikki gjørt greitt í orðingini í lógaruppskotinum.

Av viðmerkingunum til lógaruppskotið, sum bygt varð á at gera samsvarandi ásetingar í donsku ferðslulógina, sæst m.a.:

> " Efter færdselslovens § 118, stk. 1, nr. 1, straffes overtrædelse af de generelle og køretøjsbestemte hastighedsgrænser (§§ 42 og 43) med bøde.
>
> Rigsadvokaten har i Meddelelse nr. 5/84 af 30. oktober 1984 fastsat retningslinier for bødetakster i bl.a. sager oth overtrædelse af de generelle hastighedsbegrænsninger. Bødetaksterne er senere justeret ved Meddelelse nr. 4/88 af 28. april 1988. Rigsadvokatens retningslinier er kun af vejledende karakt-

er for politi og anklagemyndighed, og er ikke bindende for domstolene, men i praksis udmåles bøder i hastighedssager takstmæssigt efter disse retningslinier.

De vejledende bødetakster for overtrædelse af de generelle hastighedsbegrænsninger er:

-	overskridelse under	20 km/t	300 kr.
-	fra og med	20 km/t	450 kr.
-	fra og med	25 km/t	600 kr.
-	fra og med	30 km/t	800 kr.
-	fra og med	35 km/t	1.000 kr.
-	fra og med	40 km/t	1.200 kr.
-	pr. følgende 5 km/t fra	45 km/t	+ 200 kr.

Bødetaksterne for overtrædelse af de køretøjsbestemte hastighedsbegrænsninger svarer til bødetaksterne for overtrædelse af de generelle hastigheds begrænsninger.

Bøder for overtrædelse af generelle hastighedsgrænser fastsættes efter disse bødetakster, uanset om hastighedsovertrædelsen er sket i eller uden for tættere bebygget område. Medmindre særlige forhold gør sig gældende, sker udmålingen ikke på baggrund af en konkret vurdering af karakteren af hastighedsovertrædelsen, farlighed o.lign., men bøderne fastsættes i forhold til det antal km, som hastighedsgrænsen faktisk overskrides med.

Der er altså ikke tale om, at bøderne udmåles efter hvor stor en procentvis hastighedsoverskridelse, der foreligger. F.eks. gives en hastighedsoverskridelse på 20 km i timen 450 kr. i bøde, uanset om overskridelsen sker i tættere bebygget område eller på motorvej, d.v.s. en overskridelse på henholdsvis 40% og 20%."

.....

" Det er Justitsministeriets opfattelse, at bøderne for hastighedsforseelser skal afspejle den risikoforøgelse, som hastighedsoverskridelsen medfører.

På denne baggrund foreslår Justitsministeriet, at der sker en omlægning af bødeberegningen i sager om hastighedsovertrædelser, således at der tages udgangspunkt i den procentuelle overskridelse af den aktuelle hastighedsgrænse, og således at bødeberegningen sker efter en progressivt stigende skala. Med henblik på at opnå en styrkelse af bødernes præventive effekt foreslås samtidig en skærpelse af bødeniveauet i hastighedssager i forhold til i dag."

.....

" Den foreslåede beregningsform skal anvendes, hvad enten der er tale om en overskridelse af generel hastighedsgrænse, jfr. færdselslovens § 42, stk. 1-3, en lokalt fastsat hastighedsgrænse, jfr. § 42, stk. 4 og 5, eller en køretøjsbestemt hastighedsgrænse, jfr. § 43.

I tilknytning til en omlægning af bødeberegningen finder Justitsministeriet, at der bør fastsættes særlige bødetakster for lastbiler med en

tilladt totalvægt over 3.500 kg og for vogntog bestående af en sådan lastbil og et registreringspligtigt påhængskøretøj, således at bøderne for hastighedsoverskridelser med disse køretøjer belægges med et tillæg på 50%."

.....

" Herefter vil de vejledende bødetakster for overtrædelse af de generelle hastigheder være således:

Hastighed	Bødetakst for personbiler m.v.		Bødetakst for lastbiler og lastbil-vogntog
	Alle veje undtagen motorveje	Motorveje	Alle veje
	Kr.	Kr.	Kr
Hastighedsoverskridelse under 20%	400	600	600
Fra 20% men under 30%	600	900	900
Fra 30% men under 40%	850	1.300	1.300
Fra 40% men under 50%	1.150	1.750	1.750
Fra 50% men under 60%	1.500	2.250	2.250
Fra 60% men under 70%	1.900	2.850	2.850
Fra 70% men under 80%	2.400	3.600	3.600
Fra 80% men under 90%	3.000	4.500	4.500
Fra 90% men under 100%	3.700	5.500	5.500
100% eller mere	4.500	6.750	6.750

Som motorvej i relation til bødetaksterne anses kun motorveje med en tilladt hastighed på 100 km i timen eller mere.

De foreslåede bødetakster vil indebære, at en kørsel med 60 km i timen på vej, hvor hastighedsgrænsen er 50 km i timen, altså en 20% hastighedsoverskridelse, vil udløse 600 kr. i bøde. Kørsel med 120 km i timen på en motorvej med en hastighedsgrænse på 100 km i timen vil tilsvarende udløse 900 kr. i bøde.

Der vil af anklagemyndigheden blive nedlagt bødepåstand i overensstemmelse med ovenstående bødetakster for hastighedsforseelser begået efter lovens ikrafttræden."

Vísandi til hesar viðmerkingar og við atliti at, at tað ikki eru motorvegir í Føroyum, og við atliti at, at **stk. 3, 2. pkt.** í í lógaruppskotinum eisini fevnir um bussar, hvørs loyvda totalvekt fer upp um 3.500 kg, og vognrøð av einum bussi, hvørs loyvda totalvekt fer uppum 3.500 kg, og eitt skrásetingarskyldugt viðfest akfar, verða hesi sektargjøld skotin upp til brot á hámarksferð:

	Hámarksferð					
				Sektargjald *)		
%	50	60	70	80	1	2
u/20	51-59	61-71	71-83	81-95	400	600
20-29	60-64	72-77	84-90	96-103	600	900
30-39	65-69	78-83	91-97	104-111	850	1.300
40-49	70-74	84-89	97-104	112-119	1.000	1.700
50-59	75-79	90-95	105-111	120-127	1.500	2.200
60-69	80-84	96-101	112-118	128-135	1.900	2.900
70-79	85-89	102-107	119-125	136-143	2.400	3.600
80-89	90-94	108-113	126-132	144-151	3.000	4.500
90-99	95-99	114-119	133-139	152-159	3.700	5.600
100-109	100-104	120-125	141-146	160-167	4.500	6.800
110-119	105-109	126-131	147-153	168-175	5.400	8.100
120-129	110-114	132-137	154-160	176-183	6.400	9.500
Brot á hámarksferð í % og km/t						

*) **Sektargjald 1:** **persónbilar og motorsúkklur**
Sektargjald 2: **bussar, lastbilar og vognrøð**

Til § 1, nr. 29:
Í lógaruppskotið verður gjørd nýggj **§ 58 b** áseting um, at við serliga grov ella endurtikin brot á ferðslulógina kann hald verða lagt á motorakfarið, ið var nýtt til brotið. um hetta verður mett neyðugt at fyribyrgja enn fleiri brot á ferðslulógina, og um ikki haldið er óríminligt.

Sambært §§ 75-77 a í revsilógini er longu møguleiki at fremja hald av lutum. ið hava verið nýttir til revsiverda gerð. Alternativt kann fremjast virðishald.

Innan ferðslulógarinnar øki verður hald næstan bara nýtt í málum við konstruktivum broytingum av knallertum. Hald av motorakfari. ið hevur verið nýtt til brot á ferðslulógina - heruppií rúsdrekkakoyring - verður eftir siðvenju bara gjørt í hendinga førum.

Endamálið við at gera serligar haldásetingar í ferðslulógini - hóast haldreglurnar í revsilógini í meginreglum eisini fevna um tilburðir, sum lógaruppskotið nevnir inniti - er at gera eina broyting av rættarpraksis møguliga á hesum øki, soleiðis at dómstólarnir fara at nýta hald av motorakfari oftari enn sum nú er.

Við hesum verður møguleiki fyri, at oftari at leggja hald á motorakfør fer at hava við sær eina yvirhøvur fyribyrging - partvís av at tær fíggjarligu avleiðingarnar merkjast væl - og partvís við at gerðin beinleiðis ger. at eingin møguleiki framvegis verður at nýta tann lut. ið nýttur varð til lógarbrotið.

Ætlanin er, at hald serliga skal fremjast í niðanfyristandi sløgum av ferðslulógarbrotum:

1. Í grovum ella endurtiknum førum av rúsdrekkakoyring. og eisini eindømum. har tilburðurin vísir eina fyrilitsleysa skúgvan til viks av ferðslutrygdini.
2. Endurtikin koyring í fráðømingarskeiðnum, ið vísa lítla virðing fyri fráðømingini av førararættindunum, uttan tó at koyringarnar koma í námind av 8-10 í fráðømingarskeiðnum. sum í dag er kriterið fyri hald samhæn revsilógina.
3. Endurtikin koyring uttan nakrantið at hava fingið koyrikort.

Ein áseting svarandi til uppskotið er gjørt í donsku ferðslulógini við lóg nr. 278 frá 8. mai 1991.

Til § 1, nr. 30:
Nýggja § 58 c í lógaruppskotinum er ein ritstjórnarlig broyting.

Samsvarandi ásetingar um aftorhald av einum motorriknum akfari í førum, har bæði førari og motorrikna akfarið, sum misbrotið er framt við, hoyra heima í útlendum, eru í revsireglunum í galdandi ferðslulóg, jbr. § 58, stk. 11-13.

Til § 1, nr. 31:
Broytingin er ritstjórnarlig.

Til § 1, nr. 32:
Í § 58 b í galdandi ferðslulóg eru ásetingar um møguleikarnar hjá løgregluni at áleggja gjald fyri misbrot av ávísum støðgi- og parkeringsforboðum.

Sambært § 58, stk. 2 í ferðslulógini kann í staðin fyri gjald áleggjast sekt, um støðgurin ella parkeringin hevur verið til vanda fyri onnur, ella óneydugt hevur anupað ferðsluna.

Skotið verður upp, at møguleikin at áleggja gjald verður víðkaður til at fevna um fylgjandi misbrot:

1. § 33, stk. 2, sambært hvørjari støðgur ella parkering bert kann vera í høgru síðu av vegnum á ferðslukósini. Á vegi við minni ferðslu og á vegi við einvegis ferðslu kann tó støðgast og parkerast í vinstru síðu. Við støðg ella parkering skal akfarið setast við ytru rond á koyribreytini ella, har tað er gjørligt, uttanfyri hesa.
2. § 33 a, stk. 2, nr. 1, sambært hvørjari parkering ikki má gerast frammanfyri innkoyring til og frá húsum,
3. Sambært § 33 a, stk. 2, nr. 5 - sum orðað í hesum lóguruppskoti - kann parkering ikki fara fram á koyribreytini á høvuðsvegi uttanfyri fjølbygt øki.

Tað eru eisini gjørdar ritstjórnarligar broytingar við atliti at galdandi ásetingum.

Til § 1, nr. 33-35:
Sambært galdandi ásetingum í § 58 d í ferðsluløgini kann fátin, har tað snýr seg um rúsdrekka- og prómillukoyring og har revsingin annars ikki verður meira enn sekt, ið stuðin fyri at lata inn kærurit til rættin kunna ákærda um, at málið kann avgreiðast uttan rættarmeinsøkn, um hann viðgongur seg sekan í brotinum og váttar seg til reiðar at gjalda eina í kunningini ásetta sekt, og góðtekur frádøming av koyrikorti í einum nærri ásettum tíðarskeiði.

Samsvarandi áseting er galdandi fyri møguleikanum hjá dómaranum at avgera slík mál um góðtøku av sekt og frádøming av koyrikorti, tá hann ikki ivast í skuld skuldsetta/ákærda.

Lógaruppskotið víðkar henda møguleika til uttanrættarligu og innanrættarligu góðtøku av sekt og frádøming av koyrikorti til at fevna um tilburðir, har tað kann vera talan um frádøming av koyrikorti vegna brot á hámarksferð, jbr.**§ 1, nr. 38 í lógaruppskotinum.**

Í uppskotnu orðingini eru gjørdar broytingar í mun til galdandi ásetingar við atliti at teimum í lógaruppskotinum gjørdu ásetingarnar um treytaða frádøming av koyrikorti, sml. serliga **§ 1, nr. 38 og 40.**

Til § 1, nr. 36:
Broytingin er ritstjórnarlig.

Til § 1, nr. 37-43:
Tær galdandi ásetingarnar um frádøming av koyrikorti í tilburðum av rúsdrekka- og prómillukoyring og eisini koyrimistøk o.l. eru gjørdar í § 59 og §§ 59 a-d.

Eftir hesum ásetingum skal frádømast koyrikort í tilburðum við rúsdrekka- og promillukoyring, koyring utan ans til munandi umhugsni til ferðslutrygdina, ávís hámarksbrot og onnur ávís brek við koyringini. Undir serliga lintandi umstøðum er ikki neyðugt at frádøma við rúsdrekka- og promillukoyring.

Frádøming hevur við sær koyribann í frádømingarskeiðnum. Brot verður revsað við hefti ella fongsul upp til eitt ár, ella undir serliga lintandi umstøðum við sekt.

Skotið verður upp at gera ein nýggjan atferðarhátt - treytað frádøming av koyrikorti - í tilburðum av rúsdrekkakoyring undir serliga lintandi umstøðum, promillukoyring við eini alkoholkonsentration í blóðinum yvir 0,80 o/oo, koyring uttan ans til munandi umhugsni til ferðslutrygdina, ávís hámarksbrot og ávís onnur brek við koyringini.

Treytað frádøming hevur ikki við sær sum treytaleys frádøming koyribann, men í førum av afturstigi í royndarskeiðnum verður treytaða frádømingin ógildað og hevur við sær nýggja, treytaleysa frádøming fyri báðar tilburðir.

1. Donsk ferðslulóggáva:

1.1. Frádøming vegna koyrimistak o.l.:

Við lóg nr. 270 frá 26. juni 1975 vórðu áseitingarnar um frádøming av koyrikorti vegna koyrimistak o.l. í donsku ferðslulógini broyttar:

Sambært teimum upp til tá galdandi ásetingum skuldi koyrikortið frádømast, tá førarin "hevði koyrt akfarið á grovt óforsvarligan hátt ella tað annars við atliti at slagið av gjørda misbrotinum og hvat annars er kunnugt um viðurskifti føraransins sum føruri av motorriknum akfari, verður hildið ivasamt við atliti til ferðslutrygdina, at hann framvegis førir motorrikið akfar".

Nágreiniliga innihaldið av ásetingunum varð sett sambært umfatandi dómspraksis.

Orsøkin til broytingarnar í 1975 var, at tað sambært dómspraksis var gjørd frádøming í fleiri førum, har tað í vanligari talu ikki hevði verið so beinrakið at sagt, at subjektivu viðurskiftini hjá føraranum vóru grovt óforsvarlig. Hetta hendi serliga í førum, har annars royndir og ansnir motorførarir mistu førararættin av koyrimistaki, har atvoldin var ein lítið óansni. Hesi mál vóru kend sum "klapp mál". Hetta gjørdi at umhugsað varð ein broyting við atliti at avmarka økið fyri galdandi ásetingar, soleiðis at tað slapst undan frádøming fyri "klapp-mistøk". Men tað vísti seg at vera sera trupult at tilevna eina reglu, ið ein vegin lat "klapp-mistøk" sleppa og hinvegin gjørdi møguligt at frádøma førararættin í førum, har óforsvarliga koyringin ikki bert kom av óansni eitt stutt bil ella ein fyrigeviligan tilburð, men har mett varð, at førarin hevði vágað sær, ella á annan hátt ikki vilja tikið fyrilit til hinar trafikantarnar. Við atliti at fyribyrging ivaðist ein í at sleppa frádøming af førararættinum í førum, har tað vael ikki hevði verið serliga átaluverdur atburður, men har tað í samband við óansni tó hevði verið frá einum objektivum sjónarmiði hættislig koyring. Úrslitið av hesi umhugsan varð, at grundreglan um frádøming af førararætti av koyrimistaki o.l. varð orðað annarleiðis, men var tó varðveitt til nýtslu á einum øki samsvarandi við tað galdandi. Við øðrum orðum hevur broytta orðingin frá fyrru áseting ikki við sær nakra broyting í tí rættarpraksis, ið er komin igjøgnum 20 ár, soleiðis, at markið millum teir tilburðir har frádømt verður, og teir har frádømt verður til eina kæra um frádøming, er tann sami. Tað nýggja og avgerandi er, at gjørdur varð ein nýggjur háttur fyri frádøming av førararætti - treytað frádøming. Treytirnar fyri treytaða frádøming er, at viðkomandi í einum tíðarskeiði oppá 3 ár ikki førir motorrikið akfar undir umstøðum, ið gera at førararættarin verður honum frádømdur. Sambært galdandi ásetingum í donsku ferðslulógini er meginreglan, at frádøming skal vera treytað. Frávik frá hesi meginreglu og harvið nýtslan av treytaleysari frádøming av førararættinum ber í sær serligar umstøður, t.v.s. at mistakið, sum tað snýr seg um er serliga grovt, at tað snýr seg um fleiri sjálvstøðug brot til dóms í senn, ella talan er um afturvendandi tilburðir.

Í viðmerkingunum til fógaruppskotið frá 1975 verður m.a.sagt:

> " Hensynet til forebyggelse af færdselsuheld kræver imidlertid ikke nødvendigvis, at frakendelse sker ubetinget. Efter justitsministeriets mening vil de nævnte præventive hensyn kunne varetages gennem en ordning, hvorefter frakendelse ved førstegangsovertrædelser som udgangspunkt sker betinget. Dette vil indebære, at frakendelsen suspenderes med den virkning, at der sker ubetinget frakendelse, hvis føreren inden for en periode af 3 år på ny fører motordrevet køretøj under sådanne omstændigheder, at frakendelse skal ske, medens virkningerne af den betingede frakendelse i modsat fald bortfalder. Den betingede frakendelse vil således virke som en kraftig advarsel til føreren.
>
> Ved en sådan ordning vil man også opnå at afbøde de meget alvorlige konsekvenser, som en ubetinget frakendelse har i de tilfælde, hvor føreren i sit erhverv eller på anden måde, f.eks. ved transport til og fra arbejde, er afhængig af at kunne benytte motorkøretøj.
>
> Der findes imidlertid situationer, hvor ubetinget frakendelse fortsat bør anvendes også ved førstegangsovertrædelser. Hvor der foreligger en særlig hensynsløs kørsel, forekommer det ikke at motivere at anvende betinget frakendelse. En sådan kørsel udsætter normalt andre trafikanter for fare og vil være udtryk for en holdning hos føreren, som gør det betænkeligt at lade den pågældende fortsætte som fører uden afbrydelse."

1.2. Frádøming vegna rúsdrekka- ella promillukoyring:

Í 1976 var danska ferðslulógin fyri eini víttfevnandi broyting - ferðslulóg nr. 287 frá 10. juni 1976.

Tær undir 1.1. nevndu ásetingar um frádøming av koyrikorti vegna koyrimistak o.l. vórðu óbroyttar fluttar inn í 1976-lógina.

Við gildiskomu av hesi lóg varð gjørdur fastur promillumarkaður og munur á promillukoyring og rúsdrekkakoyring. Tað er promillukoyring, tá alkoholkonsentrationin í blóðinum undir og aftaná koyringina fer upp um 0,80 o/oo og ikki upp um 1,20 o/oo.

Viðvíkjandi frádøming av koyrikorti skal promillukoyring javnsetast við koyrimistak o.l., soleiðis at meginreglan verður treytað frádøming. Á sama hátt verður givið treytað frádøming við rúsdrekkakoyring undir serliga lítnandi umstøðum.

Í 1976-lógini vórðu gjørdar tvær týðandi reglur um frádøming av koyrikorti.
a) Hugtakið treytað frádøming varð íbirt.
b) Frádømingarreglurnar vórðu gjørdar til eina eindarskipan. Við endurteku (nýggj koyring, sum er grundað á frádøming aftaná treytaleysa frádøming ella í royndarskeiðnum fyri treytaðu frádøming) var tað hereftir uttan týdning, um frádømingargrundarlagið var tað sama við báðar koyringar ella ikki. Soleiðis hevur tað t.d. endurtøkuavleiðingar við koyrimistak o.l. aftaná rúsdrekkakoyring, ella øvugt.

2. Føroysk ferðslulóggáva:

2.1. Frádøming vegna koyrimistak o.l.:

Galdandi ásetingarnar um frádøming av koyrikorti vegna koyrimistak o.l.vóru gjørdar í ferðslulógini við løgtingslóg nr. 67 frá 5. juni 1986. Tær eru tær somu sum tær í Danmark í 1975 gjørdu broytingar, jfr. viðmerkingar undir 1.1., tó tað til mun, at ávís hámarksbrot í sjálvum sær eru frádømingargrundaði.

Tó vórðu ikki - sum í donsku ferðslulógini - gjørdar ásetingar um treytaða frádøming av koyrikorti.

Við hesi lógarbroyting var ætlanin, at bar tað sambært donskum rættarpraksis verður dømt treytað, skal dømast treytaleyst sambært føroysku ferðslulógini.

2.2. Frádøming vegna rúsdrekka- ella promillukoyring

Galdandi ásetingarnar um frádøming av koyrikorti vegna rúsdrekka- ella promillukoyring vóru gjørdar í ferðslulógini við løgtingslóg nr. 57 frá 12. maj 1980 og løgtingslóg nr. 67 frá 5. juni 1986.

Við fyrru lóg vórðu sett føst promillumørk og skilnaður millum rúsdrekkakoyring og promillukoyring. Ásetingarnar eru tær somu sum tær broytingar, ið vórðu gjørdar í Danmark í 1976, jbr. viðmerkingarnar undir I.2, men tó við tí munt, at í føroysku lóggávuni eru gjørdar ásetingar sum kriminalisera, at førarin undir ávísum umstøðum drekkur rúsdrekka aftaná koyring er endað (6-tíma reglan).

Ásetingar vórðu ikki gjørdar - sum í donsku ferðslulógini - um treytaða frádøming við promillukoyring ella rúsdrekkakoyring undir serliga linnandi umstøðum.

3. Gongdin á ferðsluøkinum tey seinastu árini:

	1989	1990	1991	1992	1993	1994	1995	1996	1997
Skrásett akfør pr. 31/12	18.774	18.035	17.497	17.044	15.894	15.145	15.504	16.170	17.056
Meldaði ferðsluóhapp alt	2.145	1.691	1.614	1.508	1.262	1.077	1.109	1.093	1.029
av hesum við persónskaða	106	74	70	69	59	45	48	58	53
av hesum við materiellum skaða við rapport	426	364	376	359	312	277	297	296	261
av hesum við materiellum skaða uttan rapport	1.613	1.256	1.168	1.075	891	755	764	739	717
Skuldsetingar í alt fyri brot á ferðslulógarinnar § 15 (heilivágur v.m.), 16 (rúsdrekka– og promillukoyring)	318	329	306	264	224	169	133	150	170
av hesum við ferðsluóhapp við persónskaða	27	17	17	15	18	5	7	8	10
av hesum við ferðsluóhapp uttan persónskaða	86	81	56	54	48	31	32	28	45
av hesum uttan ferðsluóhapp	205	231	233	195	158	133	94	114	115
Onnur brot á ferðslulógina (skuldsettir persónar)	1.425	1.583	2.359	2.316	2.246	1.667	1.981	2.129	3.136

Sum heild hevur gongdin verið positiv. Tó hevur tað verið ein øking hesi seinastu tvey árini í talinum av skuldsettum fyri rúsdrekka- og promillukoyring.

4. Umhugsanir hjá nevndini um at fáa í lag treytaða frádøming av førararættinum:

Nevndin metir, at ein sampakking eigur at gerast við tær donsku ásetingarnar um frádøming av koyrikorti vegna rúsdrekkakoyring undir serliga linnandi umstøðum, promillukoyring og koyrimistøkum o.l.

Tá tað hevur verið eitt ávíst alfurhald við atliti at tí eldru lógaruppskotunum at skjóta upp at gera treytaða frádøming, skal hetta væl saktans siggast í samband við innihaldið um niðurkriminalisering í hesum uppskotinum við at nýta sekt við fyrstu ferð tilburðir av rúsdrekku- og promillukoyring. Hesi uppskot, ið eru samtykt, hava við sær, at sekt er tann vanliga revsingin fyri rúsdrekka- og promillukoyring. Bert tá promillan

fer upp um 2.00. ella tá umstøðurnar eru herðandi, verður frælsisrevsing nýtt við fyrstu ferð tilbundin. Eitt uppskot at gera treytaða frádøming - eisini við frádøming vegna koyrimistak o.l. - kundi hildist at verið ein ónskt viknan av ti fyribyrgjandi árinum av reglunum um frádøming av koyrikorti, sum ferðslan var í 80-unum, tá var eyðkend av vaksandi tilburðum av ferðsluóhappum við nógvum deyðum og løstaðum.

Tann undir 3. vísta gongdin á ferðsluøkinum tey seinnu árini og onnur viðurskifti kunnu vera við til at broyta metingina av spurninginum um at gera treytaða frádøming.

4.1. Treytað frádøming vegna koyrimistak o.l.:
Orsøkirnar nevndar undir 1.1. fyri Danmark at gera treytaða frádøming fyri koyrimistak o.l. eru eisini gald andi fyri føroyskar umstøður. Ásetingin í § 59 a, nr. 2 í galdandi ferðslulóg um obligatoriska treytaleysa frádøming av koyrikorti við at fara upp um 30 km/t yvir tær vanligu og akfaraásettu hámarksferðirnar er ein burturvið hørð undgerð, tá kann hava við sær ómetaligar figgjarligar avleiðingar, herundir eisini arbeiðsloysi.

Sum nevnt undir 2.1 var ætlanin um ikki at seta fram uppskot um treytaða frádøming við koyrimistak o.l., at har tað samsvarar danskan praksis verður givið treytaða frádøming, skal treytaleys frádøming vera samsvarar føroyska lóggávu.

Henda fyritreyt ella ætlan hevur ikki víst seg sum samroytd. Treytaleys frádøming kann ikki gevast í førum, har tað eftir donskum rættarpraksis verður dømt treytað frádøming.

Økið, har tað eftir galdandi lóggávu verður dømd treytaleys frádøming vegna koyrimistak o.l., er tí sera lítið - avmarkað til sera grov koyrimistøk og til brot á hámarksferð, jbr. § 59 a, nr. 2 í ferðslulógini.

Um gjørt verður eftir uppskotinum og gjørt treytað frádøming fyri koyrimistak o.l., verður frádømingarøkið víðkað munandi. Tá fer tað at fevna um øll koyrimistøk o.l., tá samsvarar danskan rættarpraksis hava treytaða frádøming við sær.

Treytaða frádømingin fer at virka sum en sterk ávaring. Um fórarin í eitrum 3 ára skeiði aftur fórar motorrikið akfar undir slíkum umstøðum at frádøming skal gerast, verður frádømingin treytaleys, meðan árinini av treytaðu domingini annars detta burtur. Fórarin verður soleiðis serliga ámyndaður at halda ferðslulógina.

Uppskotið um treytaða frádøming vegna koyrimistak o.l. samsvarar við § 1, nr. 27 í lógaruppskotinum um at geva herda sekt fyri ávís brot á ferðslulógina - ferðshættislig brot og brot á hámarksferð - mugu ætlast at hava fyribyrgjandi árin, ferðslutrygdini at fremja.

4.2 Treytað frádøming vegna rúsdrekka- og promillukoyring:
Tey undir 4.1 nevndu fyribyrgjandi árin av treytaðari frádøming mugu ætlast eisini at gera seg galdandi við treytaðari frádøming vegna promillukoyring við eini alkoholkonsentratión omanfyri 0,800 o/oo.

Uppskotið um treytaða frádøming vegna rúsdrekkakoyring snýr seg bert um tilburðir, har frádøming samsvarar galdandi áseting í § 59, 2. Pkt. í ferðslulógini kann frávíkjast við serliga hinnandi umstøðum. Í praksis er reglan bert nýtt í heilt fáum førum.

Ráðið fyri Ferðslutrygd hevur í skrivi frá 27. januar 1985 til nevndina seu fram fylgjandi spurningar um treytaða frádøming fyri promillukoyring:

> " Ráðið fyri Ferðslutrygd takkar fyri, at vit fingu hovi til at gera viðmerkingar til ætlaðu broytingarnar í ferðslulógini.

Tað hevur sum kunnugt stóran týdning, at allir partar, sum hava við ferðslusparningar at gera, arbeiða væl saman ferðslutrygdini til frama.

Nevndin hevur havt fleiri fundir um málið og eftir hesta larimunt roynt at gjørt sínar viðmerkingar til broytingaruppskotið umframt aðrar viðmerkingar."

.....

" **Viðv. 1) Treytað frádøming af koyrikorti fyri promillukoyring.**

Sambært § 59 a í uppskotinum verður nú møguligt at fáa treytaða frádøming av koyrikortinum hjá persóni, ið er tikin fyri promillukoyring.

§ 59 er broytt til bert at fata um spirituskoyring, og § 59 a er varðin úthygd við stk. 2, sum eru treytirnar fyri, nær frádømning av koyrikortinum kann verða treytað. Her er umframt promillukoyring talan um treytaða frádøming fyri at koyra av skjótt og fyri vandafulla koyring.

At møguleiki skal vera fyri at fáa treytaða frádøming av koyrikortinum, er ein rættiliga prinsippiel broyting, og fekk hendan grein eisini eina sera drúgva umrøðu í nevndini.

Menn ivaðust, um rætt er at gera broytingarnar, og vóru hesir spurningar umrøddir:

- Kann slík linking fáa onkran at lugsa sum so: "lat meg taka kjansin, eg missi ikki koyrikortið fyrr enn aðru ferð"?
- Ferðslutrygdararbeiðið má m.a. hava til endamáls at gera øllum greitt, at tað er annaðhvørt rúsdrekka ella bilkoyring, ikki bæði!
- At tað er ein tilvitað gerð at seta seg at koyra bil eftir at hava drukkið.
- Tá ið fólk, ið eru ávirkað av rúsdrekka, koyra bil, setur tey eisini onnur í vanda.
- At vera ávirkaður innanfyri promillumarkið kann eisini skyldast, at persónurin hevur drukkið nógv kvøldið fyri, og tí í dupultum týdningi er óegnaður at føra bil.
- Er ferðslumentanin so framkomin í Føroyum, at slík liberalisering kann metast at vera forsvarlig ?

Men eisini grundgevingar fyri, at broytingarnar verða gjørdar, vóru tiknar fram:

- Linkingin er helst ein partur av vanligu linkingini á revsiumráðum og eitt ynski um eina stigvísa herðing av revsimøguleikunum á sama hátt, sum fyri lógarbrot annars.
- Tað er væl eisini hugsandi, at ein sersáttmáli millum tað almenna og einstaklingin um, at hann sleppur við koyrikortinum hesa ferð, men hendir tað sama aftur, felst harmarin harðliga.
- Á henda hátt er tað gjørt greitt á serliga tydiligan hátt fyri einstaklinginum, hvat hann hevur at missa, og at hann er nærri missinum enn onnur, um hann aftur koyrir promillukoyring.
- Hesin hugsunarháttur tykist at vera í samsvar við nútímans náms fræði um uppaling av børnum til góðan atburð og til samfelagsborgarar við ábyrgd.
- Í Danmark hevur henda skipan verið roynd síðan mitt í sjeytiárunum, og royndirnar har benda sum skilst á, at hesin hugsunarháttur er rættur, tí har

fremja bert fá hetta brot oftari enn ta einu ferðina.

Eftir drúgt kjak fyri og fmóti kom nevndin í RFF til ta niðurstoðu, at hon sum heild tekur undir við broytingunum."

Galdandi revsitiltøk fyri rúsdrekka og promillukoyring í fyrstu ferð forum eru fylgjandi:

o/oo	uttan herðandi umstøður	við herðandi umstøðum
0,81 - 1,20	sekt + frádøming í 1 ár	sekt + frádøming í 1½ ár
1,21 - 1,50	sekt + frádøming í 1½ ár	sekt + frádøming í 2 ár
1,51 - 2,00	sekt + frádøming í 2 ár	14 daga hefti + frádøming í 2½ ár
2,01 - 2,50	14 daga hefti + frádøming í 2½ ár	20 daga hefti + frádøming í 3 ár
2,51 -	20 daga hefti + frádøming í 2½ ár	30 daga hefti + frádøming í 3 ár

Um uppskotið um treytaða frádøming verður fraint, verða revsitilløkini fyri rúsdrekka- og promillukoyring við eini alkoholkonsentratión í blóðinum yvir 0,80 o/oo við fyrstu ferð tilburðir samsvarar donskum rættarpraksis hesir

o/oo	uttan herðandi umstøður	við herðandi umstøðum
0,81 - 1,20	sekt + treyta frádøming	sekt + frádøming í 1 ár
1,21 - 1,50	bøde + frakendelse í 1 år	sekt + frakendelse í 2 år
1,51 - 2,00	sekt + frádøming í 2 ár	14 daga hefti + frádøming í 2½ ár
2,01 - 2,50	14 dages hæfte + frakendelse í 2½ år	20 dages hæfte + frakendelse í 3 år
2,51 -	20 daga hefti + frádøming í 2½ ár	30 daga hefti + frádøming í 3 ár

Um reaktiónirnar av promillukoyring við eini alkoholkonsentratión í talstrekkinum 0,51 - 0,80 o/oo verður víst til viðmerkingarnar til **§ 1, nr. 4 í lógaruppskotinum.**

Til § 1, nr. 37:
Ásetingin snýr seg um frádøming vegna rúsdrekkakoyring. Við rúsdrekkakoyring er meginreglan treytaleys frádøming. Sambært uppskotinum er bert heimild til at lata sær lynda við treytaða frádøming, um tað eru serliga littnandi umstøður.

Uppskotið er í samsvar við § 59 í galdandi ferðslulóg við tí broyting, at sambært uppskotinum kann treyt að frádøming nýtast, um umstøðurnar eru sera littnandi. Eftir galdandi ásetingum kann frádøming sleppast í hesum førum.

Tú orðingin er broytt er ásetingin í samsvar við tilsvarandi áseting í donsku ferðslulógini.

Til § 1, nr. 38:
Ásetingin snýr seg um frádøming vegna koyrimistak o.l. og promillukoyring við eini alkoholkonsentrsatión í blóðinum uppá meira enn 0,80 o/oo. Meginreglan er treytað frádøming.

Orðingin, ið er uppskotin til **stk. 1, nr. 1, 3, 4 og 5,** svarar til § 59 a, nr. 1-3 í galdandi ferðslulóg við fylgjandi broytingum:

Sambært galdandi áseting í § 59 a, nr. 2 skal frádømast um koyrt verður við eini ferð, ið fer upp um tær vanligu hámarksferðir ella tær akfarsásettu hámarksferðir við meira enn 30 km/t ella staðligar hámarksferðir við meira enn 30 km/t ella eina sambært § 30 a, stk. 2 ella § 47 ásetta lægri hámarksferð við meira enn 20 km/t.

Nú verður skotið upp, at skilt verður millum løtt og tung akfør (tey akfør, fyri hvørji sambært § 30 b er sett akfarsásett hámarksferð.).

§ 1, nr. 3, snýr seg um lættari akfør, fyri hvørji frádømingargrundarlagið er sama brot á ferðina, sum eftir galdandi ferðslulóg.

§ 1, nr. 4, snýr seg um tung akfør, har frádømingargrundarlagið er eitt brot á ferðina uppá meira enn 20 km/t við atliti at loyvdu hámarksferðini fyri hesi akfør ella eina sambært § 30 a, stk. 2, ella § 47 sett lægri hámarksferð.

Orsøkin til skilnaðin millum løtt og tung akfør eru tær í **§ 1, nr. 18 í lógaruppskotinum** uppskotnu hekklingar av akfarsásettum ferðum. Við atliti at ferðslutrygdini verður tað bildið vágiligt, at frádømingargrundarlagið - brot á hámarksferð uppá meira enn 30 km/t - verður vardveitt fyri tey akfør, ið eru fevnd av uppskotnu orðingini av § 30 b. Víst verður annars til viðmerkingarnar til **§ 1, nr. 18 í lógaruppskotinum.**

Stk. 1, nr. 2 í ásetingini snýr seg um frádøming við promillukoyring við eini alkoholkonsentration uppá meira enn 0,80 o/oo. At hon er sett saman við ásetingunum um frádøming vegna koyrimistak o.l. kemst av uppskotinum um treytaða frádøming fyri hetta misbrot.

Í **stk. 2** í ásetingini er uppskotið um sum meginregla at nýta treytaða frádøming fyri koyrimistak o.l. og promillukoyring við eitti alkoholkonsentration omanfyri 0,80 o/oo.

Stk. 2, nr. 1-4, nevnir tilburðarnar, har treytaleys frádøming skal nýtast. **Nr. 3-4** samanborið við **§ 1, nr. 40 í lógaruppskotinum,** um rættarárinini av eini treytaðari frádøming, innihalda tað í ironleiðandi parti undir **1.2.** nevndu eindarskipan.

Sambært uppskotnu orðingina av § 59 a er samsvar við tilsvarandi áseting í donsku ferðslulógini. Tó er tann munur, at frádømingargrundarlagið fyri brot á hámarksferð í donsku ferðslulógini er 70% yvir loyvdu ferðir. Tó verður ætlandi ein broyting á vári 1998 soleiðis, at frádømingargrundarlagið fyri koyring við akførum, hvørs hægst loyvda ferð er akfarsásett (tung akfør), verður broytt til 40% útaum av teimum fyri hesi akfør loyvdu ferð.

Eftir hesum kann danskur rættarpraksis yvirhøvur nýtast til viðurskiftini í ásetingini.

Til § 1, nr. 39:
Uppskotna ásetingin samsvarar við § 59 b í galdandi ferðslulóg við teimum broytingum, sum koma av uppskotinum um at taka upp treytaða frádøming.

Til § 1, nr. 40:
Í uppskotnu orðingini til nýggja **§ 59 c** eru ásetingarnar um rættarárinini av treytaðari frádøming.

Týdningarmiklasta rættarávinni av treytaðari frádøming eru, at ein ikki missur koyrikortið. Viðkomandi hevur soleiðis framvegis sítt koyrikort. Hann kann halda áfram við at koyra bil o.l. hóast treytaðu frádømingina, og einki frádømingarskeið verður ásett. Í staðin verður ein treyt bundin at frádømingini í eini royndartíð. Vanliga er royndartíðin 3 ár. Treytin, sum viðkomandi skal halda alla royndartíðina fyri ikki at missa koyrikortið treytaleyst, er, at hann ikki koyrur motorrikið akfar undir slíkum umstøðum, at koyrikortið aftur verður honum frádømt. Um treytin verður brotin skal ásetast ein felags og vanliga treytaleys frádøming, sum fevnir um bæði tann upprunaliga og nýggja tilburðin, og so skal ásetast eitt frádømingarskeið.

Enn eitt rættarárin av treytaðari frádøming er, at tað vanliga skal farast upp **til eina eftirlitsroynd. Víst verður til § 1, nr. 13 í lógaruppskotínum.**

Til § 1, nr. 41-43:
Umframt ritstjórnarligar broytingar eru gjørdar broytingar, ið koma av uppskotinum um at hava treytaða frádøming.

Til § 1, nr. 44:
Við gildi frá 15. juli 1990 varð lingin í lag ein skipan, har tey ið eru dømd fyri rúsdrekka- og promillukoyring kunnu søkja um útsetan at sita dóm vegna tess, at tey eru í viðgerð fyri rúsdrekkamisnýtslu.

Skipanin fevnir um persónar, ið eru dømdir frælsisrevsing uppá 40 dagar ella minni fyri rúsdrekka- og promillukoyring. Viðkomandi skal hava tyðuligan tørv á rúsdrekkaviðgerð, og skal hava byrjað viðgerð fyri rúsdrekkamisnýtslu undir eftirliti. Bert hendingaferð fevnir skipanin um tilburðir, har treytaleys revsing fevnir um annað enn brot á ferðslulógina.

Dømd, ið uppfylla hesar treytir kunnu rokna við útsetan av at sita dómin, vanliga í 1 ár treytað av, at einki revsivert verður gjørt í útsetingarskeiðnum, og at tey geva seg undir eftirlit av Kriminalforsorgini um vilkor fyri framhaldandi rúsdrekkaviðgerð. Um útsetingarskeiðið gongur væl kann roknast við treytaðari náðing um ein framhaldandi er leysur av revsing í 1 ár, gjaldan av eini sekt og moguliga framhaldandi eftirlit og vilkor um viðgerð í einum nærri ásettum tíðarskeiði. Sektin er vanliga helvtin av sektini givin fyri rúsdrekka- og promillukoyring.

Um løgreglan verður varug við, at dømdi í útsetingarskeiðnum fremur nýggjan kriminalitet, fellur aftur til rúsdrekkamisnýtslu ella á annan hátt fremur brot á settu treytirnar, skal løgreglan skjótast gjørligt boða Løgmálaráðnum frá. Eitt umsitandi frá eftirlitsmyndugleikanum skal fylgja við. Løgmálaráðið gert so av, um avgerðin um treytaða útsetan skal detta burtur.

Skipanin, ið síðani er víðkað til at fevna um persónar, ið eru dømdir frælsisrevsing uppá 60 dagar ella minni, er eisini galdandi í Føroyum.

Uppskotna broytingin skal metast sum eitt ynski um enn meira at eggja dømdum rúsdrekkakoyrandi at fara í viðgerð fyri rúsdrekkamisnýtslu.

Samhært galdandi reglum í § 59 a í ferðslulógini kann spurningurin um at fáa koyrikortið aftur innan frádømingarskeiðið er runnið, ikki leggjast aftur fyri rættin fyrr 3 ár eru liðin av frádømingarskeiðnum, og koyrikortið kann bert fáast aftur undir heilt serligum umstøðum. Um viðkomandi fyrr hevur mist koyrikortið, verður kortið bert hendingaferð givið aftur, og ikki fyrr enn 6 ár frá tí degi frádømt varð.

Samhært uppskotinum verður **nýtt stk. 2** gjørt í galdandi § 59 c.

Eftir hesum kann málið um at fáa kortið aftur í førum, har forsvarsrættarin er frádømdur vegna rúsdrekka- ella promillukoyring, tó leggjast fyri dómstólurnar tá helvtin av frádømingarskeiðnum, tó í minsta lagi 1 ½ ár.

er runnið. Um førararættarin í slíkum førum er frádømur við at fáa kortið aftur ikki leggjast fyri dómstólarnar fyrr enn 5 ár av frádømingarskeiðnum eru runnin. Førararættarin kann bert fáast aftur um viðkomandi í minst 1 ár áðrenn málið verður lagt fyri rættin hevur yvirhildið eina viðgerð fyri rúsdrekkamisnýtslu undir eftirliti.

Eitt uppskot sum so toluliga samsvarar uppskotinum er viðgjørt sum Løgtingsmál nr. 169/1992. Uppskotið vann ikki fram. Uppskotið er samsvarandi við áseting arnar í donsku ferðslulógini, jbr. lóg nr. 278 frá 8. mai 1991 sum broytt við lóg nr. 468 frá 10. juni 1997.

Et til forslaget nogenlunde svarende forslag er behandlet som

Til § 2:
Í ásetingini eru lógartekniskar skiftisásetingar.

Til § 3:
Skotið verður upp at lógin kemur í gildi dagin eftir hon er kunngjørd. Tó eigur at umhugsast, við atliti at møguleikunum at upplýsa um nýggju ásetingarnar, um ikki ein seinni dagur skal setast til gildiskomu. Ráðið fyri Ferðslutrygd kundi sett upplýsingarnar í verk.

Skotið verður upp, at ásetingin í **§ 1, nr. 5 í lógaruppskotinum** um bann móti nýtslu av hondhildnum mobiltelefonum kemur í gildi tann 1. januar 1999. Um grundgevingina, sí viðmerkingarnar.

Um grundgevingina fyri gildisásetingina av **§ 1, nr. 11 og 12 í lógaruppskotinum**, sí viðmerkingarnar.

1. viðgerð fríggjadagin 13. mars 1998. Uppskotið verð beint í rættarnevndina.

Málið fall burtur sbr. stýrisskipanarlógini § 15 stk. 3, tí at løgtingsval var 30. apríl 1998, og málið ikki var liðugt viðgjørt á tingi fyri valið.

F.L. j.nr. 640-3/90

123 Uppskot til løgtingslóg um útbúgvingarstuðulsskipan

Ár 1998, hósdagin 5. mars, legði Eilif Samuelsen, landsstýrismaður, vegna landsstýrið fram soljóðandi

Uppskot
til
løgtingslóg um útbúgvingarstuðulsskipan

Kapittul 1
Endamál við Útbúgvingarstuðlinum

§ 1. Endamálið við útbúgvingarstuðlinum samhært hesi lóg er at gera tað fíggjarliga møguligt hjá øllum borgarum í Føroyum at nema sær útbúgving.

Kapittul 2
Stuðulsskipanir og upphæddir

§ 2. Tey sum eru 18 ár ella eldri, fáa í mesta lagi fylgjandi útbúgvingarstuðul í einum stuðulsári:

Heimabúgvandi	22.000 kr.
Útibúgvandi	33.000 kr.

Frá tí lógin fer gildi til 31. desember 1998 eru frammanfyri nevndu upphæddir tó hesar:

Heimabúgvandi	18.500 kr.
Útibúgvandi	29.500 kr.

Stk. 2. Tann, ið er í útbúgving, og sum er 18 ár ella eldri, kann í stuðulsárinum fáa lestrarlán upp til 22.000 kr.

Stk. 3. Lesandi í hægri útbúgvingum og lesandi, sum eru forsyrgjarar, verða roknað sum útibúgvandi, jbr. stk. 1. Frá tí lógin fer gildi til 31. desember 1998 verða tó bert lesandi sum eru forsyrgjarar at rokna sum sum útibúgvandi, jbr. stk. 1.

stk. 4. Tann, sum er í útbúgving og er yngri enn 18 ár, kann í studulsárinum fáa upp til 3.000 kr. í iskoytisstuðli til keyp av undirvísingartilfari.

Stk. 5. Landsstýrismaðurin kann áseta nærri reglur fyri fskoytisstuðli til ferðing til og frá skúla og fskoytisstuðli til lesandi undir 18 ár, sum noydast at flyta til útbúgvingarstaðið

Stk. 6. Landsstýrismaðurinin ásetir nærri reglur fyri:

1) hvørjar útbúgvingar geva rætt til studul.
2) nærri treytir fyri studuli til hægri útbúgvingar.
3) um útrokning av stuðli styttri enn eitt ár,
4) um treytirnar fyri at vera roknaður sum heimabúgvandi og útibúgvandi, og
5) studulstíðina.

Kapittul 3

Studulstreytir

§ 3. Studulsstovnurin veitir eftir umsókn studul til fólk í útbúgving sum:

1) eru í einari útbúgving í Føroyum, sum av landsstýrismanninum er studulsheimilað smb. kunngerð.
2) eru føroyingar ella hava annan ríkisborgararætt enn tann føroyska/danska, og viðkomandi, áðrenn hann er fyltur 20 ár, hevur tikið fastan bústað saman við foreldrunum í Føroyum, ella um hann, eftir at hava fylt 20 ár, hevur havt fastan bústað í Føroyum minst tvey samanhangandi ár, áðrenn farið verður undir útbúgvingina.
3) eru lestrarvirkin í Føroyum
4) Ikki fáa annan almennan studul, ið er ætlaður til livikostnað.

Stk. 2. Landsstýrismaðurin kann áseta nærri reglur fyri útbúgvingarstuðli til fólk í útbúgving, ið fáa aðra almenna hjálp og kann í hesum sambandi áseta, at hesi ikki fáa lestrarlán.

Stk. 3. landsstýrismaðurin kann áseta nærri reglur fyri at veita studul, tá ið talan er um norðurlenskt, evropeiskt ella alheims lestrarsamarbeiði.

Kapittul 4

Regulering av studulsupphæddum

§ 4. Studulsstovnurin veitir útbúgvingarstuðul og lán, sum fyri hann einstaka skal samsvara við tær upphæddir, viðkomandi hevur rætt til.

Stk. 2. Studulsstovnurin kann steðga ella broyta útgjaldan av upphæddum, um broytingar hendar í viðurskiftum hins lesandi, ið hava ávirkan á studulsveitingina.

Stk. 3. Upphæddir, ið eru goldnar fyri mánaðir har studulsmóttakarin ikki lykur studulstreytirnar, skulu verða krævdar aftur. *Stk. 4.* Landsstýrismaðurin kann áseta nærri reglur um ásetingarnar í stk. 2. og stk. 3.

Kapittul 5

Rentan og afturrindan av lestrarláni

§ 5. Endaligt veitt lestrarlán sambr. § 6, stk. 1 verður at renta í útbúgvingartíðini við eini árligari rentu, sum er 4%. Síðani rentar upphæddin eftir lokna útbúgving við 1% omanfyri ta til eina og hvørja tíð galdandi diskonto. Landsstýrismaðurin ásetir reglur um útbúgvingartíðina, um hvørjar fylgjur steðgur í útbúgvingini fær, og um skyldu lántakaranna at geva upplýsingar um hetta.

Stk. 2. Afturrindan av lestrarláni, eisini afturrindan av rentum, skal vanliga byrja 1 ár aftaná, at tað studulsárið er úti, har ið útbúgvingin er lokin. Landsstýrismaðurin kann áseta reglur um afturrindan av lestrarlánum.

Stk. 3. Um lántakari doyr, áðrenn lánið er afturgoldið, kann Studulsstovnurin strika restskuldina. Hendu áseting er eisini galdandi fyri lán har lántakari doyði áðrenn hendu lóg kom í gildi.

§ 6. Um lántakarin ikki lykur lánstreytirnar kann skuldin sigast upp til skaðaleysa afturrindan.

Stk. 2. Krøv smb. stk. 1 verða fyrisitin av Føroya Gjaldstovu, ið innkrevir skuldina.

Stk. 3. Føroya Gjaldstova ásetur rentuafturgjaldstreytir fyri mishildin lestrarlán.

Stk. 4. Heimilað verður Føroya Gjaldstovu at innkrevja tað, Studulsstovnurin hevur til góðar, við rentum við at afturhaldu løn o.a. hjá lántakaranum, sambært reglunum fyri innkrevjan av persónsskatti í samtíðarskattalógini.

Stk. 5. Reglurnar í hesi § vera eisini at nýta í sambond við innkrevjing av skuld til Studulsstovnin sum stavar frá tíðini áðrenn hendu lóg kom í gildi.

Kapittul 6

Fyrisiting, kærumoguleiki o.a.

§ 7. Studulsstovnurin fyrisitur útbúgvingarstuðulin. Landsstýrismaðurin ásetur nærri reglur fyri stovnin.

Stk. 2. Studulsstovnurin fær heimild til at fáa tær upplýsingar um tann einstaka umsøkjaran frá almennum myndugleikum, ið eru neyðugar fyri at útrokna studulin.

Stk. 3. Landsstýrismaðurin kann áseta reglur um innihald og uppsetan av umsóknum, lánsskjølum o.ø., um útgjalding av studli, um hvørjar upplýsingar, ið kunnu krevjast skrivligar, og um frelstir fyri umsóknir, inngjaldingar og fráboðanir.

Stk. 4. Fólk í útbúgving skulu geva upp navn, bústað og persónstal, tá ið sókt verður um stuðul og tá ið tey annars venda sær til Stuðulsstovnin.

§ 8. Landsstýrismaðurin kann avgera, at Stuðulsstovnurin skal fyrisitast saman við ella av øðrum almennum stovni.

§ 9. Avgerð tikin av Stuðulsstovninum um:

1) grundarlagið fyrf veitan og útroknan av stuðli til fólk í útbúgving ella
2) at ein stuðulstakari skal afturrinda stuðul, kann áðrenn 6 vikur eru gingnar, eftir at boðað er frá avgerðini, kærast til Kærunevndina hjá Stuðulsstovninum av tí, ið avgerðin viðvíkur. Avgerð kærunevndarinnar er endalig innan fyrisitingina.

Stk. 2. Landsdsstýrismaðurin setir kærunevnd við 3 limum. Formaðurin skal vera logfrøðingur. Limirnir verða settir fyri 4 ár í senn. Landsstýrismaðurin kann áseta reglur fyri kærunevndina.

§ 10. Landsstýrismaðurin kann áseta nærri reglur fyri almennan útbúgvingarstuðul, ið ikki kemur undir hesa lóg.

Stk. 2. Stuðulsstovnurin fyrisitur almennan útbúgvingarstuðul, ið ikki kemur undir hesa lóg.

§ 11. Henda lóg fær gildi 1. august 1998 og samstundis fer løgtingslóg nr. 109 frá 15. september 1988 um útbúgvingarstuðul sum broytt við løgtingslóg nr. 43 frá 30. mars 1990 úr gildi.

Almennar viðmerkingar


Ásannast má, at verandi lóg um útbúgvingarstuðul hevur munandi brek. Í høvuðsheitum kann sigast, at samhæri hagtølunum er keypiorkan hjá teimum lesandi minkað við umr. 40% síðani útbúgvingarstuðulin varð tikin við í heildarveitingina í 1988 (sí talvuna niðanfyri).

	Stuðuls-upphædd kr.	Árlig broyting %	Kumuleraður vøkstur %	Prístals-vøkstur %	Kumuleraður vøkstur %	Fall í Keypiorku %
1988/89	29.412			3,2		
1989/90	27.696	-5,8	-5,8	7,2	7,2	-13,0
1990/91	26.471	-4,4	-10,3	4,2	11,4	-21,7
1991/92	26.471	0,0	-10,3	4,0	15,4	-25,7
1992/93	26.471	0,0	-10,3	3,6	19,0	-29,3
1993/94	26.471	0,0	-10,3	1,3	17,7	-28,0
1994/95	26.471	0,0	-10,3	6,9	24,6	-34,9
1995/96	26.471	0,0	-10,3	3,7	28,3	-38,6
1996/97	26.471	0,0	-10,3	2,6	30,9	-41,2
1997/98	26.471	0,0	-10,3	3,4	34,3	-44,6

Keldur: Hagtíðindi & Árbók fyri Føroyar

Serliga eru tað tey lesandi yvir 18 ár, sum búgva til leigu, og tey, sum mugu ferðast fyri at koma í skúla, sum eru illa fyri.

Føroyski útbúgvingarstuðulin er í mun til aðrar norðurlendskar útbúgvingarstuðulsskipanir illa fyri. Talvan niðanfyri vísir eina samanbering millum ymisku norðurlendsku skipanirnar og tyduliga sæst, at tann føroysku ikki kann javnmetast. Tølini, ið nýtt eru, eru árligar stuðulsveitingar til lesandi við hægri lærustovn yvir 18 ár, sum eru útibúgvandi.



Eisini er útbúgvingarstuðulin illa fyri samanborin við stuðul frá Arbeiðsloysisskipanini ella Almannastovuni. Hetta hevur týdning, tá fólk undir hesum skipanum yniskja at fara undir útbúgving.

Tað kemst tí ikki uttan um, at um nakað raunagott skal gerast, verður neyðugt við størri játtan á fíggjarløgtingslógini.

Umhugsaðir hava verið ymiskir møguleikar fyri at betra um verandi skipan, uttan at hesir skuldu kosta meira. Ein møguleiki kundi t.d. verið, at á útbúgvingum, sum geva vinnumarleikar, kundi lánsparturin av tí samlaða stuðulinum hækkað. Grundgevingin fyri hesi áskoðan er, at tann lesandi við at útbúgva seg ger eina íløgu, sum hann seinni vinnur inn aftur við hægri løn. Trupulleikin er bert, at um tað verður dyrari at útbúgva seg í Føroyum í mun til í Danmark, taka vit grundarlagið undan teimum føroysku útbúgvingunum, tá føroyingar heldur velja at fara til Danmarkar at lesa.

Meginbroytingarnar við nýggju útbúgvingarstuðulsskipanini

Mælt verður til fylgjandi meginbroytingar í eini nýggjari útbúgvingarstuðulsskipan:

- Endamálið við útbúgvingarstuðulsskipanini skal inn í lógina, og eigur skipanin at hava til endamáls at tryggja øllum føroyingum javnbjóðis møguleika fyri skúfagongd.
- Stuðulsupphæddin skal hækkast hjá teimum, sum eru yvir 18 ár.
- Aldursmarkið skal hækkast til 18 ár fyri at fáa stuðul.
- Ískoytisstuðul til ferðaútreiðslur.
- Ískoytisstuðul til avbyggdarmenningar undir 18 ár.
- Ískoytisstuðul til tey undir 18 ár til keyp av undirvísingartilfari.

Umframt omanfyri nevndu meginbroytingar verður mælt til, at onnur smærri broytingar verða gjørdar í lógarverkinum.

Fíggjarligi kostnaðurin sum stendst av lógaruppskotinum

Mælt verður til, at lesandi undir 18 ár ikki longur fáa útbúgvingarstuðul til lívikostnað. Samstundis verður mælt til, at hesi somu fáa ískoytisstuðul til útreiðslur, sum standast av heimleiðis undirvísingartilfari og ferðing, eins og serligur stuðul eigur at verða latin teimum, sum verða noydd at flyta til útbúgvingarstaðin.

Fyri tey, sum eru yvir 18 ár, verður mælt til, at:

- heimabúgvandi fáa kr. 2.000 í stuðuli og kr. 2.000 í láni um mánaðin í 11 mánaðir
- útibúgvandi fáa kr. 3.000 í stuðuli og kr. 2.000 í láni um mánaðin í 11 mánaðir

Mælt verður til, at øll lesandi, sum eru føreldur, og øll lesandi við hægri lætistovu altíð verða roknað sum útibúgvandi.

Við støði í hagtølunum fyri lesandi í Føroyum, eru roknaðar sparingarnar og meirkostnaðin av omanfyri nevndu broytingum. Hesar eru lýstar í niðanfyristandandi talvu. Viðmerkjast skal, at næmingatalið, fyri ferðaskoyti og avbygdaskoyti, er mett, og eigur tí at takast við fyrivarni.

	Tal av næm	Stuðul um árið gomul lóg	Stuðul um árið nýggj lóg	Kostn. um árið gomul lóg	Kostn. um árið nýggj lóg	Munur um árið
ÚS-grundstuðul						
Undir 18 ár heimab.	238	7.303	0	1.741.015	0	1.741.015
Undir 18 ár útib.	93	16.430	0	1.527.754	0	1.527.754
Yvir 18 ár heimab.	685	17.343	22.000	11.883.789	15.074.863	-3.191.074
Yvir 18 ár útib.	1.003	26.471	33.000	26.560.897	33.112.070	-6.551.173
Tilsamans	**2.020**			**41.713.455**	**48.186.933**	**-6.473.478**
ÚS-ískoytisstuðul						
Bóka ískoyti	331		3.000	0	993.000	-993.000
Ferðaískt. avh. næm.	50		13.200	0	660.000	-660.000
Ferðaískoyti	300		4.400	0	1.320.000	-1.320.000
Ískoyti til hægr. lest.	65		11.000	0	715.000	-715.000
Tilsamans	**681**				**3.688.000**	**-3.688.000**
Tilsamans				**41.713.455**	**51.874.455**	**-10.161.000**

Nýggja lóganuppskotið er mett at hava við sær eina samlaðan meirkostnað uppá 10.161.000 kr. um árið. Meirkostnaðurin kann sundurgreinast í triggjar bólkar:

1. lesandi undir 18 ár fáa ikki longur grundstuðul 3.268.769 kr.
2. hækkingin í stuðulsupphæddunum til tey lesandi yvir 18 ár -9.742.247 kr.
3. ískoytisstuðul til avbygdanæm., hægr. lest., ferðing og undirvísingartilfar -3.688.000 kr.

At meta um liggjarligu avleiðingarnar av økta lánimøguleikunum er eitt sindur torførari. Hetta kemst av, at torpult er at meta um støðuna hjá teimum sum í dag lána. Av teimum umr. 1.688 lesandi, sum í dag hava møguleika fyri at lána, eru umr. 210 sum nýta møguleikan.

Møguleiki er fyri, at ein partur av teimum, sum í dag taka lán, ikki longur hava tørv á láni, um studningurin hækkar. Hinvegin kann eisini hugsast, at ein partur av teimum, sum í dag taka lán, hava tørv á meiri peningi og tískil vilja brúka økta lánimøguleikan. Mett verður, at ikki verður neyðugt við hægri játtan, um lánimøguleikarnir verða øktir samsvarandi tilmælinum. Hetta skal tó takast við fyrivarni.

Skotið verður upp, at lógin fær gildi frá Laugust 1998. Hetta hevur við sær, at útgjaldast skal eftir nýggju lógini í 5 mánaðir í verandi fíggjarári. Av tí at aymarkingar eru í galdandi fíggjarlóg verður skotið tipp, at stuðluppheddirnar frá tí lógin fær gildi fram til 31. desember 1998 verða avmarkaðar í ávísan mun.

Uppskotið til løgtingslóg um útbúgvingsstuðulsskipan byggir í stóran mun á álitið frá einum arbeiðsbólki umboðandi Stuðulsstovnin, lestrarvegleiðarafelagið og LFÚ.

Álitið hevur verið til ummælis hjá MFS, LFÚ, Lestrarvegleiðarafelagnum, Almannastovuni og Føroya Gjaldstova.

Tá ummælisfreistin var úti, hevði Undirvísingar- og mentanálastýrið fingið ummæli frá Lestrarvegleiðarafelagnum, MFS og LFÚ.

Hjálagt: Álit um nýggja útbúgvingarstuðulsskipanog ummæli frá Lestrarvegleiðarafelagnum, MFS og LFÚ.

Víst verður annars til viðmerkingarnar til tær einstoku greinarnar niðanfyri.

Viðmerkingar til tær einstoku greinirnar
Kap. 1
Ad. § 1.
Í galdandi lóg er er ikki nøkur endamálsorðing. Skotið verður upp, at endamálið við útbúgvingarstuðulsskipanini verður sett í sjálva lógina.

Kap. 2
Ad. § 2. Sambært stk. 1 í løgtingslógaruppskotinum kunnu lesandi sum eru 18 ár ella eldri í einum stuðulsári fáa í mesta lagi fáa ávikavist 22.000 kr. sum heimabúgvandi og 33.000 kr. sum útibúgvandi. Tó eru framanfyri nevndu upphæddir ávikavist 18.500 kr. fyri heimabúgvandi og 29.500 kr. fyri útibúgvandi frá tí lógin fær gildi til 31. desember 1998.Harumframt kann tann sum er 18 ár ella eldri sambært stk. 2 fáa stuðulslán upp til 22.000 kr.

Eftir galdandi skipan, kann heimabúgvandi undir 18 ár fáa upp til 7.303 kr., heimabúgvandi yvir 18 ár 17.343 kr., útibúgvandi undir 18 ár 16.430 kr. og útibúgvandi yvir 18 ár 26.471 kr. Harnæst kunnu lesandi 18 ár og eldri fáa upp til 13.692 kr. í lestrarláni.

Lesandi sum eru undir 18 ár fáa sum meginreglu upp til 3000 kr. til keyp av undirvísingartilfari (stk 4.) Sambært stk. 5 hevur landsstýrismaðurin møguleika fyri at áseta nærri reglur um ískoytisstuðil til ferðing til og frá skúla og ískoytisstuðul til lesandi undir 18 ár sum noydast at flyta til útbúgvingarstaðið. Tey sum eru undir 18 ár fáa sum meginreglu ongan annan stuðul.

Lesandi við hægri útbúgvingar sum t.d. lesandi á Fiskiskaparsetrinum og lesandi sum eru forsyrgjarar fáa sama stuðul sum útibúgvandi sambært stk. 1. Tó verða bert lesandi sum eru forsyrgjarar at rokna sum útibúgvandi frá tí lógin fær gildi til 31. desember 1998.

Sambært stk. 6 áseta landsstýrismaðurin hvørjar útbúgvingar koma undir skipanina, treytir fyri stuðli, treytirnar fyri at vera roknaður sum heimabúgvandi ella útibúgvandi og um tíðina ein kann fáa stuðul. Í galdandi lóggávu liggur henda heimild hjá Stuðulsstovninum.

Kap. 3
Ad. § 3. Sambært hesi grein er treytin fyri at fáa stuðul at tað fyriliggur ein umsókn. Harnæst skal útbúgvingin fara fram í Føroyum og verða stuðulsheimilað sambært kunngerð við heimild í § 2 stk 6. Fer útbúgving fram í Danmark koma føroyingar sum danskir ríkisborgarar undir stuðulskipanina hjá " Statens Uddannelsesstøtte ".

§ 3 stk 1 2), 3) og 4) eru somu ásetingar sum í galdandi lóg. Í stk 2 er møguleiki at áseta reglur fyri útbúgvingarstuðli til fólk ið fáa aðra ameenna hjálp. Talan kann vera um t. d. um útbúgvingartiltøk innan forsorgar- og avlamisøki.

Í stk. 3 er heimild at áseta nærri reglur um stuðulsveiting til lesandi sum søkja sær lærdóm í londum uttanfyri Føroyar og Danmark. Líknandi reglur eru við heimild í galdandi lóg.

Kap. 4
Ad. § 4. Í hesi § verður verður staðfest, at Stuðulsstovnurin hevur tvinnanda slóg av veitingum:
1) útbúgvingarstuðul og 2) lán. Meginreglan er tann, at hin lesandi hevur rætt til stuðul sambært §2 stk. 1 og lán sambært §2 stk. 2. Stuðulin verður vanliga roknaður fyri eitt vitt lestrarár í senn. Henda broytingar í lestrarviðurskiftunum hjá tí lesandi er møguleiki fyri at broyta, stoðpa ella krevja aftur av nógvan útgoldnan stuðul.

Kap. 5
Ad. § 5. stk. 1 og stk. 2 eru somu reglur sum í galdandi lóg. Í stk. 3 er heimilað Stuðulsstovninum at strika

restskuld hjá lántakara sum doyr áðrenn lánið er afturgoldi. Henda regla er eisini galdandi um so er at lántakari doyði áðrenn henda lóg kom í gildi.

Ad. § 6. Í verandi lóggávu eru ongar serligar reglur fyri innheinting av skuld í sambandi við afturgjalding av lestrarláni tá lántakari ikki yvirliheldur afturgjaldsskyldina. Skotið verður upp, at heimilað verður Føroya Gjaldstovu at krevja lánskuldina aftur eftir somu reglum sum eru galdandi fyri tunkrevjing av persónskatti í samtíðarskattalógini. Í stk. 5 verður skotið upp, at framvegis nevndu reglur eisini verða galdandi fyri lestrarlán sum tikin eru samhliða galdandi lóg.

Kap. 6
Ad. §§ 7, 8 og 9. Hesar §§ snúgva seg um fyrisiting, karmmøguleikar o.a. Reglurnar eru tær somu sum í galdandi lóg. Tó verður skotið upp, at tað er landsstýrismaðurin sum skal áseta nærri reglur um øll viðurskifti í hesum §§ sum skulu regulerast við kunngerð.

Ad. § 10. Í hesi § er møguleiki hjá landsstýrismanninum, at áseta nærri reglur fyri øðrum almennum útbúgvingarstøðli sum ikki kemur undir lógina um útbúgvingarstuðulsskipan, og at Stuðulsstovnurin skal fyrisita hesa. Ásetingin svarar til § 12 í galdandi lóg.

Ad. § 11. Skotið verður upp, at lógin fær gildi frá 1. august 1998 og at verandi lóg um útbúgvingarstuðul fer úr gildi sama dag.
+ skjal.

Álit um nýggja útbúgvingarstuðulsskipan

desember 1997

Formæli
Arbeiðsbólkurin, sum landsstýrismaðurin í undirvísingar- og menningarmálum setti í apríl 1997 at endurskoða og gera uppskot til nýggja útbúgvingarstuðulslóg, letur við hesum landsstýrismanninum "Álit um nýggja útbúgvingarstuðulsskipan".

Arbeiðsbólkurin metir soleiðis arbeiði sítt at verða liðugt og vónar, at arbeiði hansara má verða føroyska skúlaverkinum og næmingum tess at gagni.

Tórshavn, 5. desember 1997
John Rajani, form., Bjørg Róin, Páll Isholm

1. Inngangur
1.1 Tilnevning og arbeiðssetningur
Landsstýrismaðurin í undirvísingarmálum, Eilif Samuelsen, hevur í skrivi, dagfest 2. apríl 1997, eftir tilmæli frá m.a. Lestrarvegleiðarafelgunum og LFÚ, sett limir í ein arbeiðsbólk til at endurskoða ÚS-stuðulsskipanina.

Í arbeiðsbólkinum sótu:
John Rajani, fíggjarfulltrúi í Landsskúlafyrisitingini og leiðari av Stuðulsstovninum (formaður)
Bjørg Róin, studentaskúlalærari og lestrarvegleiðari
Páll Isholm, lesandi við Fróðskaparsetur Føroya

Í tilnevningarskrivinum verður m.a. sagt, at arbeiðssetningurin verður:

Við støði í verandi útbúgvingarskipan skal arbeiðsbólkurin lýsa lestrarmynstrið í Føroyum býtt sundur í ungdómsútbúgvingar og hægri útbúgvingar.

Arbeiðsbólkurin skal eftir samrøður við m.a. umboð fyri tey lesandi, lestrarvegleiðarar og Almannastovuna meta um figgiugartørvin hjá teimum lesandi.

Arbeiðsbólkurin skal kunna seg um útbúgvingarstuðulsskipanir í grannalondum okkara.

Við støði í omanfyri standandi og við atliti at teimum figgjarkarmum, sum givnir eru á figgjarløgtingslógini til útbúgvingarstuðul, skal arbeiðsbólkuriu koma við tilmæli um eina bóskandi stuðulsskipan.

Arbeiðsbólkurin skal útfrá tilmæli sínum gera eitt uppskot til eina dagføring av verandi lógarverki. T.e. Ll. nr. 109 frá 15. 09. 1998 um útbúgvingarstuðul (sum broytt við Ll. nr. 43 frá 30. 03. 1990) og Reglugerð um útbúgvingarstuðul, januar 1990.


Arbeiðsbólkurin hevði sín fyrsta fund tann 9. apríl 1997 og hevur tilsamans havt 24 fundir. Av hesum hava 16 verið innanhýsis fundir, og 8 hava verið við ymiskar áhugabólkar. Seinasti fundurin var 5. desember 1997. Harumframt hava limirnir í arbeiðsbólkinum arbeitt við álitinum millum regluligu fundirnar.

1.2 Arbeiðið í arbeiðsbólkinum

Í arbeiðsbólkinum hevur orðaskiftið mest snúð seg um lestrarviðurskiftini hjá teimum ungu í Føroyum, trupulleikarnar við verandi ÚS stuðulsskipan, og hvussu ein nýggj útbúgvingarstuðulsskipan eigur at verða skipað.

Arbeiðsbólkurin ásannar, at verandi lóg um útbúgvingarstuðul hevur ummarkandi brek. Í høvuðsheitum kann sigast, at samlaert lagtalsmunum er keypiorkan hjá teimum lesandi minkað við umr. 40% síðani útbúgvingarstuðulin varð tikin við í heildarveitingina í 1988 (sí talvu á síðu 13). Serliga eru tað tey lesandi yvir 18 ár, sum búgva til leigu, og tey, sum mugu ferðast fyri at koma í skúla, sum eru illa fyri.

Føroyski útbúgvingarstuðulin er í mun til aðrar norðurlendskar útbúgvingarstuðulsskipanir illa fyri. Talvan niðanfyri vísir eina samanbering millum ymisku norðurlendsku skipanirnar og tyduliga sæst, at tann føroyska ikki kann javnmetast. Tølini, ið nýtt eru, eru árligar stuðulsveitingar til lesandi við hægri lærustovn yvir 18 ár, sum eru útibúgvandi, (sí nærri lýsing í fylgiskjali 6.1)



Eisini er útbúgvingarstuðulin illa fyri samanborin við stuðul frá Arbeiðsloysisskipanini ella Almannastovuni. Hetta hevur týdning, tá fólk undir hesum skipanum ynskja at fara undir útbúgving.

Tað kemst tí ikki uttan um, at um nakað munagott skal gerast, verður neyðugt við stórri játtan á fíggjarløgtingslógini.

Arbeiðsbólkurin hevur umhugsað ymiskar møguleikar fyri at betra um verandi skipan, uttan at hesar skuldu kosta meira. Ein møguleiki kundi t.d. verið at á útbúgvingum, sum geva vinnuførleika, kundi lánsparturin av tí samlaða stuðulinum hækkað. Grundgevingin fyri hesi áskoðan er, at tann lesandi við at útbúgva seg ger eina íløgu, sum hann seinni vinnur inn aftur við hægri løn. Ítrupulleikin er bert, at um tað verður dýrari at útbúgva seg í Føroyum í mun til í Danmark, taka vit grundarlagið undan teimum føroysku útbúgvingunum, tá føroyingar heldur velja at fara til Danmarkar at lesa.

Tá arbeiðsbólkurin var avmarkaður í sínum arbeiðssetningi til at halda seg til teir karmar, sum givnir vóru á fíggjarløgtingslógini, var neyðugt við fundi við landsstýrismannin um málið.

Arbeiðsbólkurin hevði gjørt sær eina metting av, hvat ein munagóður batti vildi kostað landskassanum, og varð henda meting løgd fyri landsstýrismannin á fundi 27. november 1997. Kunnað varð um trupulleikan við orðingini í arbeiðssetninginum, og at trupult var at koma við nakrari munagóðari endurskoðan, um hildið varð fast við orðingina í arbeiðssetninginum.

Niðurstøðan av fundinum varð, at landsstýrismaðurin tók støðu arbeiðsbólksins til eftirtektar, samstundis sum hann heitti á arbeiðsbólkin um at arbeiða víðari við álitinum uttan tær avmarkingar, sum liggja í fíggjarkarmunum til útbúgvingarstuðul.

Við støði í arbeiði arbeiðsbólksins og við støði í arbeiðssetninginum mælir arbeiðsbólkurin til fylgjandi meginbroytingar í eini nýggjari útbúgvingarstuðulsskipan:

- Endamálið við útbúgvingarstuðulsskipanini skal inn í lógina, og eigur skipanin at hava til endamáls at tryggja øllum føroyingum javnbjóðis møguleika fyri skúlagongd, bæði tá ið hugsað verður um fíggarligu og geografisku støðu hins einstaka.
- Stuðulsupphæddin skal hækkast hjá teimum, sum eru yvir 18 ár: Nevndin heldur, at tá ið ein gerst 18 ár, er ein ikki longur undir forsyrgjaraskyldu foreldranna, og eigur ein tí at hava møguleika fyri at fáa stuðul til lestur, sum í sær sjálvum er nóg mikið at liva fyri.
- Aldursmarkið skal hækkast til 18 ár fyri at fáa stuðul, tí foreldur hava forsyrgjaraskyldu, til børnini eru fylt 18 ár.
- Ískoytisstuðul til ferðaútreiðslur.
- Ískoytisstuðul til avbygdanæmingar undir 18 ár.
- Ískoytisstuðul til tey undir 18 ár til keyp av undirvísingartilfari.

Umframt omanfyri nevndu meginbroytingar mælir nevndin til, at aðrar smærri broytingar verða gjørdar í lógarverkinum. Hesar verða nærri lýstar í sjálvum álitinum.

Arbeiðsbólkurin varð biðin um at dagføra verandi lógarverk og eru broytingaruppskotini tískil innskrivað í uppskotið til nýggja útbúgvingarstuðulslóg og reglugerð, sum er partur av álitinum.

2. Verandi skipan og uppskot til broytingar

Hesin táttur í álitinum er skipaður á tann hátt, at teir einstøku partarnir av verandi lóg verða viðgjørdir fyri seg. Hvør lógarpartur verður fyrst lýstur, síðani eru viðmerkingar gjørdar, og at enda verða sett fram tilmæli til broytingar. Tátturin er býttur í fylgjandi partar:

- Endamálið við útbúgvingarstuðulslóggávuni
- Stuðulsskipan

- Studulstreytir
- Fyritbils og endaligar studulsupphæddir
- Lán
- Fyrisiting, kærumogudeikar o.a.

2.1 Endamálið við útbúgvingarstuðulslóggávuni

2.1.1 Lýsing av verandi skipan

Til 1988, tá ið blokkstuðulin kom, fingu lesandi foroyingar, sum lósu í Føroyum, útbúgvingarstuðul frá SU (Statens Uddannelsesstotte). Í 1988 var gjørd ein føroysk lóg "Logtingslóg um útbúgvingarstuðul nr. 109 frá 15.9.1988".

Tað framgongur ikki av lógini, hvat endamálið við henni er. Her verður hugsað um, at tað ikki er orðað, hví vit skuldu hava eina studulsskipan, um tað skuldi verða ein studul, sum ein kundi liva av, ella tað skuldi verða ein ískoytisstuðul.

Politiska ynski við lógini var at gera eina so einfalda skipan sum møgaligt.

Tvey tey fyrstu árini bleiv stuðul givin øllum lesandi eldri enn 16 ár, t.v.s. at tey 16 ára gomlu í 10. flokki eisini fingu studul. Í 1990 bleiv hetta broytt til, at øll, sum vóru í útbúgving aftaná 10. flokk, fingu studul, og var tað ikki longur ein treyt, at tú skuldi vera 16 ár.

So at siga øll góðtóku skipanina, sjálvt um peningaupphæddin, sum bleiv givin til tann einstaka, minkaði í mun til upphæddina frá SU.

Orsøkirnar til hetta vóru millum annað, at:

- øll óansað aldur fingu studul, um tey vóru undir útbúgving aftaná framhaldsdeildina (í SU-skipanina skuldi ein vera fyltur 18 ár fyri at fáa studning),
- ÚS-upphæddirnar ikki vóru treytaðar av egininntoku,
- ÚS-upphæddirnar ikki vóru treytaðar av foreldrainntoku,
- ÚS-upphæddirnar ikki vóru treytaðar av eginogn.

2.1.2. Viðmerkingar til verandi skipan

Við at lesa lógina kann ein fáa ta fatan, at útbúgvingarstuðulin er ætlaður sum stuðul til livikostnað. M.a. stendur í § 4 stk. 4, at útbúgvingarstuðul verður veittur til fólk í útbúgving, sum "ikki fáa annan almennan stuðul, ið er ætlaður til at gjalda livikostnað."

Hinvegin eru eisini ábendingar um, at studulsskipanin er ætlað at verða ein ískoytisstuðulsskipan. Roknað verður við, at tann lesandi umframt at fáa stuðul forvinnur sær pening við síðuna av. tí studulsupphæddirnar eru so lágar, at eingin kann liva av teimum.

At kunna forvinna sær pening, uttan at tað ávirkaði stuðulin, var í 1988 ein stórur fyrimunur. Tíðirnar vóru góðar, og lætt var at finna sær nakað av arbeiði aftaná skúlatíð og í summarfrítíðini. Tey seinastu árini hevur hetta ikki verið nakar fyrimunur, tí tað er torført hjá teimum ungu at finna sær arbeiði aftaná skúlatíð og í summarfrítíðini.

Summi lesandi í dag eru tó so heppin at finna sær arbeiði aftaná skúlatíð fyri at kunna klára seg fíggjarliga. Arbeiðsbólkurin heldur hetta vera skeivt, tí fulltíðar skúlagongd er fulltíðararbeiði. Hevur ein lesandi ov nógv arbeiði við síðuna av skúlagongdini, kemur tað í mongum førum at ganga út yvir skúlagongdina við nógvari fráveru, ov vánaligari fyrireiking og ov vánaligum árslitti sum avleiðing. Ónoyd um hetta er at finna millum lesandi, foreldur, lærarar og onnur.

2.1.3 Tilmæli um broyting til verandi skipan

Endamálið við útbúgvingarstuðlinum eigur at vera at geva øllum borgarum fíggjarligan møguleika at fara undir miðnáms- ella hægri útbúgving, óansað sosialar umstøður og bústaðarviðurskifti.
Sum liður í menningini av einum samfelagi eigur fólkið at vera so væl skúlað sum gjørligt, og øll eiga at fáa møguleika at vera við í hesi menning. Tískil skal útbúgvingarstuðulin hava til endamáls at gera tað fíggjarliga møguligt hjá øllum borgarum at fáa eina útbúgving.

Tíðsini skal havast í huga, at útbúgvingarstuðulin samanborin við aðrar almennar skipanir, sum hava til endamáls at tryggja tí einstaka stuðulsmóttakaranum neyðuga inntøku til lívsuppihaldið, verður javnsettur, og hetta verður gjørt í dag, tí um ein lesandi fær útbúgvingarstuðul, er hann avskorin frá stuðuli frá hinum stuðulsskipanunum (t.e. ALS og Almannastovan).

Tá útbúgvingarstuðulin á henda hátt kann samanberast við m.a. arbeiðsloysisstuðul og forsorgarhjálp, sum eru skipanir, ið tryggja stuðulsmóttakaranum eitt minstamark fyri lívsuppihaldi, eigur útbúgvingarstuðulin at verða á hædd við hesar.

2.2 Stuðulstreytir

2.2.1 Lýsing av verandi skipan

Sambært verandi lóggávu verður veittur útbúgvingarstuðul til fólk í útbúgving sum:

- eru í einari útbúgving í Føroyum, sum av stuðulsstovninum er stuðulsheimilað sostb. kunngerð.
- eru føroyingar ella sum sambært altjóða sáttmála hava rætt til útbúgvingarstuðul á jøvnum føti við føroyingar, ella sum av Stuðulsstovninum í sambandi við stuðulsveitingina verða javnsett við føroyingar.
- eru lestrarvirkin í Føroyum og
- ikki fáa annan almennan stuðul, ið er ætlaður til at gjalda lívikostnað.

Harafturat kann Stuðulsstovnurin áseta reglur fyri útbúgvingarstuðli til fólk í útbúgving, ið fáa aðra almenna hjálp og fyri at veita stuðul, tá ið talan er um norðurlendskt, europeiskt ella altheims lestrarsamarbeiði.

Stuðulstíðin er ásett sambært reglugerð, sum Stuðulsstovnurin hevur gjørt.

2.2.2 Viðmerkingar til verandi skipan

Verandi skipan virkar væl, og nevndin heldur ikki, at neyðugt er við stórvegis broytingum.

2.3 Stuðulsskipan

2.3.1 Lýsing av verandi skipan

ÚS stuðulin er býttur sundur í 4 stuðulsbólkar. Umsøkjararnir verða bólkaðir eftir, um teir eru yvir ella undir 18 ár, og um teir eru heima ella útibúgvandi. Fylgjandi upphæddir verða veittar teimum fyra bólkunum:

- Lesandi undir 18 ár, sum búgva heima, fáa 609 kr. í stuðli um mánaðin.
- Lesandi undir 18 ár, sum búgva til leigu, fáa 1.369 kr. í stuðli um mánaðin.
- Lesandi yvir 18 ár, sum búgva heima, fáa 1.445 kr. í stuðli um mánaðin.
- Lesandi yvir 18 ár, sum búgva til leigu, fáa 2.206 kr. í stuðli um mánaðin.
  Harafturat kunnu lesandi yvir 18 ár taka lán upp til 1.141 kr. um mánaðan.

2.3.2 Viðmerkingar til verandi skipan

Samsvar hevur ikki verið millum broytingina í stuðulsupphæddum og prístali seinastu 10 árini. Sammeta vit prístalsvøksturin við gongdina í stuðulsupphæddunum fáa vit eina talvu, sum sær soleiðis út:

	Stuðuls-upphædd kr.	Árlig broyting %	Kumuleraður vøkstur %	Prístals-vøkstur %	Kumuleraður vøkstur %	Fall í Keypiorku %
1988/89	29.412			3,2		
1989/90	27.696	-5,8	-5,8	7,2	7,2	-13,0
1990/91	26.471	-4,4	-10,3	4,2	11,4	-21,7
1991/92	26.471	0,0	-10,3	4,0	15,4	-25,7
1992/93	26.471	0,0	-10,3	3,6	19,0	-29,3
1993/94	26.471	0,0	-10,3	-1,3	17,7	-28,0
1994/95	26.471	0,0	-10,3	6,9	24,6	-34,9
1995/96	26.471	0,0	-10,3	3,7	28,3	-38,6
1996/97	26.471	0,0	-10,3	2,6	30,9	41,2
1997/98	26.471	0,0	-10,3	3,4	34,3	-44,6

Keldur: Hagtíðindi & Árbók fyri Føroyar

Á hesi talvu framgongur heilt greitt, at lesandi hava verið fyri vanbýti síðan verandi studulslóg varð sam tykt. Samstundis sum prístalsvøksturin seinastu 10 árini hevur verið 34,3%, eru stuðulsupphæddirnar til lesandi lækkaðar 10,3%. Samanlagt gevur hetta eina minking í keypiorkuni hjá teimum lesandi uppá 44,6%. Avleiðingarnar av verandi skipan eru m.a.:

1. Fleiri næmingar fara úr skúlunum, tí tað fíggjarliga ikki ber til at halda fram.
2. Útbúgvingarstuðulsskipanin eggjar ikki fólki undir øðrum almennum skipanum at fara undir lestur, av tí at upphæddirnar frá ÚS eru lægri enn hjá øðrum almennum stuðulsskipanum.
3. Skipanin ger tað torført hjá óføklærdum/tilkomnum, ið hava arbeiði, at fara undir útbúgving.
4. Skipanin eggjar næmingum at arbeiða eftir skúlatíð.
5. Lesandi eru undir minstamarkinum hjá Almannastovuni, ið er 2.830 kr. Hetta skal vera eftir, tá ið leiga o.a. er goldið.
6. At fólk taka útbúgving í Danmark, hóast útbúgvingarmøguleikarnir eru í Føroyum..

2.3.3 Tilmæli um broyting í verandi skipan

Undir 18 ár

Arbeiðsbólkurin mælir til, at stuðulsútrokningin verður skild sundur eftir aldursmarki, soleiðis at næmingar undir 18 ár ikki longur fáa útbúgvingarstuðul til livikostnað. Lesandi undir 18 ár eru sambært lóg undir foreldranna forsyrgjaraskyldu, og tískil eiga foreldrini at syrgja fyri peningi til teirra livikostnað.
Tó metir arbeiðsbólkurin, at næmingar undir 18 ár eiga at fáa ískoytisstuðul til útreiðslur, sum standast av beinleiðis undirvísingartilfari[1] og ferðing[2].

Upphæddirnar ætlaðar til undirvísingartilfar eiga at verða goldnar teimum lesandi, tá ið skúlaárið byrjar. Arbeiðsbólkurin skjýtur upp, at tey, ið fylla 18 eftir 1. januar í skúlaárinum fáa fullan ískoytisstuðul til undirvísingartilfar. Tey ið fylla 18 ár millum 1. september og 31. desember fáa hálvan ískoytisstuðul til undirvísingartilfar. Arbeiðsbólkurin skjýtur víðari upp, at fullur ískoytisstuðul til undirvísingartilfar verður 2.000 kr.

Upphæddirnar ætlaðar til ferðakostnað millum heimstað og útbúgvingarstað eiga at verða goldnar mánaðarliga eftir eini talvu, sum fylgir prísinum á almennum flutningi.

Næmingar undir 18 ár, sum eru noyddir at flyta til útbúgvingarstaðið, eiga at fáa serligan stuðul sum umleið svarar til kostnaðin av einum kamari.

Yvir 18 ár

Arbeiðsbólkurin heldur, at næmingar yvir 18 ár eiga at fáa stuðul, sum er nóg mikið at liva fyri. Sum skipanin er í dag, kann tú sum lesandi yvir 18 ár í mesta lagi fáa 3.347 kr. um mán. (stuðul 2.206 kr. og lán 1.141 kr.) Skal ein leiga kamar t.d. í Havn, kostar tað í minsta lagi 1.000 kr. til 1.500 kr. um mánaðin. Almannastovan hevur eitt minstamark fyri, hvat ein skal hava at liva fyri, tá ið húsaleiga og fastar útreiðslur eru goldnar. Hetta minstamarkið er 2.830 kr. um mánaðin fyri eina persón. Stuðulin til lesandi yvir 18 ár, ið eru útibúgvandi, er umleið 1.000 kr. lægri.

1 Á ollum lærustaðunum í Føroyum skulu tey lesandi sjálv gjalda fyri bøkur og annað, sum er neyðugt fyri at kunna fylgja við undirvísingini. Tey lesandi, sum hava rætt til ískoytisstuðul, fáa 1.000 kr. í stuðli til hesi útgerðarevni, sum eftir lærustaðnum kunnu vera upphæddini ella ein partur av henni. Hesir peningar eru tó ikki skattfrír inntøkur, og tí skulu teir eisini skattleggjast.

2 Lesandi skipanir eru ikki nóg væl lagdar til, at tær lesandi hava stóran útreiðslur í sambandi við ferðing. Viðmerkingar til ferðsluna í Kappingareglunum eru tað sama sum ongantíð, tí tær eru ógreiðar og ikki nóg væl lagdar til, at tær lesandi, sum ferðast, fáa nóg stóran stuðul til ferðsluna. Tað er ikki nóg væl, at tær lesandi, sum ferðast, fáa 700 kr. um mánaðin, tá ið tað kostar at hava ein kamar at liva í fyri minsta lagi 1.500 kr. Næmingar, sum ferðast til lærustaðið, skulu annaðhvørt fáa tað, tað kostar, ella annars 400 kr. til ferðing. Nevnast skal, at nógvir lærustaðir ikki eru liðugt fyrr enn seinast í juni, og tí skulu nógvir lesandi

Stuðulin til lesandi yvir 18 ár eigur tó framhaldandi at verða givin eftir, um viðkomandi er heima- ella útibúgvandi. Sum heimabúgvandi eigur møguleiki at verða fyri einum stuðuli upp til 4.000 kr., 1/2 sum stuðul og 1/2 sum møguligt lán. Sum útibúgvandi eigur møguleiki at verða fyri einum stuðuli upp til 5.000 kr., har 3/5 verða veittir sum stuðul meðan 2/5 sum møguligt lán.

Lesandi á hægri útbúgving og lesandi, sum eru forfeldur, eiga altíð at verða roknað sum útibúgvandi.

Grundgevingar fyri skilnaðinum millum heima- og útibúgvandi eru m.a., at ásannast má, at vanliga eru útreiðslurnar ikki tær sonn heima sum úti, og um so er, hevur viðkomandi møguleika fyri at flyta í egnan bústað, og harvið fáa stuðul sum útibúgvandi.

Býtið millum stuðul og lán er ein meting eftir, hvat arbeiðsbólkurin metir forsvarligt.

Stuðulsupphæddin til tey, sum eru útibúgvandi, kr. 5000 (stuðul + lán), er ásett við støði í tí minstu upphæddini, sum Almannastovan nýtir í sínum útrokningum.

Arbeiðsbólkurin mælir til, at næmingar, ið ferðast millum heim og útbúgvingarstað, fáa ískoytisstuðul til ferðing eftir somu skipan, sum næmingar undir 18 ár.

2.4 Fyribils og endaligur stuðulsupphæddir

2.4.1 Lýsing av verandi skipan

Stuðulsstovnurin veitir lestrarstudning og lestrarlán í stuðulsárinum sum fyribils upphæddir, sum fyri tann einstaka so vítt møguligt skulu svara til tær upphæddirnar, ið viðkomandi hevur rætt til, tá ið stuðulsárið er úti.

Útgjaldingar av fyribils upphæddum í stuðulsárinum verða framdar út frá upplýsingum um lestrarviðurskifti, øðrum almennum stuðli o.a.

Stuðulsstovnurin kann steðga ella broyta útgjaldan av fyribils upphæddum, um broytingar henda í stuðulsárinum í viðurskiftum, ið kunnu fáa munandi ávirkan á stuðulsveitingina.

Fyribils upphæddir, ið eru goldnar fyri mánaðir, har stuðulsmóttakarin ikki lýkur stuðulstreytirnar, kunnu verða krevdar aftur, áðrenn tann endaliga veitingin av útbúgvingarstuðlinum verður framd.

Endaliga veitingin av lestrarstudningi og lestrarláni verður framd, tá ið stuðulsárið er úti. Um stuðulstreytirnar ikki hava verið loknar í stuðulsárinum, verður stuðulsupphæddin sett niður lutfalsliga.

Útgoldnar fyribils upphæddir, ið ikki endaliga kunnu veitast sum lestrarstudningur og lestrarlán, skulu gjaldast aftur.

Tá ið stuðulsárið er úti, skal tann, ið er í útbúgving og sum hevur tikið ímóti upphæddum í stuðulsárinum, geva allar upplýsingar, ið eru neyðugar fyri ta endaligu stuðulsveitingina.

Lýkur tann, ið er í útbúgving ikki upplýsingarskylduna, verða tær útgoldnu fyribils upphæddirnar krevdar aftur. Kravið kann tá heilt ella partvíst falla burtur, um tann, ið er í útbúgving, kortini gevur upplýsingarnar.

2.4.2 Viðmerkingar til verandi skipan

Reglúrnar hava týdning fyri umsiting Stuðulsstovnsins av útbúgvingarstuðlinum.

Ofta kemur fyri, at stuðulsfortreytirnar hjá stuðulsmóttakaranum broytast gjøgnum árið, og hóast tann lesandi sambart kap. 8 í reglugerðini hevur skyldu at boða frá broyttu viðurskiftunum til Stuðulsstovnin heim

anvegin, kemur tað meiri enn so fyri, at neyðugt er at regulera stuðulin (halda aftur ella útgjalda meira).

2.4.3 Tilmæli um broyting av verandi skipan
Arbeiðsbólkurin heldur tað ikki vera neyðugt at skilja millum fyribils og endaligar upphæddir. Tó er neyðugt at heimilað Stuðulsstovninum at regulera stuðulin, um stuðulsfortreytirnar broytast í stuðulsárinum.

2.5 Lán
2.5.1 Lýsing av verandi skipan
Í verandi skipan hava næmingar omanfyri 18 ár rætt til 1.145 kr. í láni um mánaðin. Treytirnar fyri at fáa lán eru annars tær somu sum fyri stuðul.

Árliga rentan í lestrartíðini er 4 %. Eftir lokna útbúgving er rentan 1 % omanfyri diskonto.

Aftorgjalding av lestrarláni og rentum byrjar vanliga eitt ár eftir, at útbúgvingin er lokin. Stuðulsstovnurin kann áseta reglur um aftorgjalding av lestrarlánum.

Stuðulsstovnurin stendur fyri innkrevjing av lánum, og ásetur reglur fyri, hvussu mishildin lán verða kravd inn.

2.5.2 Viðmerkingar til verandi skipan
Í verandi skipan er avmarkað, hvussu mishildin lán kunnu krevjast inn. Orsitið av hesum er, at landskassin ikki fær tann pening, hann eigur, rættstundis, og vandi kann vera fyri, at hann als ikki kemur aftur/aftur. Trupulleikar eru av og á, tá ið lántakarar doyggja. Eingin heimild er at avskriva lán hjá deyðum lántakara.

2.5.3 Tilmæli um broyting til verandi skipan
Arbeiðsbólkurin mælir til, at mishildin stuðulslán verða flutt til Føroya Gjaldstovu til innkrevjingar. Gjaldstovan hevur neyðugan sakkunnleika til hetta, umframt møguleikan at halda útistandandi aftur í skatti o.ø. hjá lántakara. Arbeiðsbólkurin mælir til, at hetta verður heimilað í lógini.

Somuleiðis verður mælt til, at um lántakari doyr, eigur møguleiki at verða fyri at strika restskuldina hjá viðkomandi. Grundin fyri hesi broyting er, at lánið er ein persónlig fløga, ið ikki eigur at tyngja onnur.

Mælt verður til, at lániupphæddirnar verða broyttar samsvarandi kap. 2.3.2. Á hendla hátt hava lesandi møguleika fyri at fáa eina forsvarliga upphæld at liva fyri.

Í aðrar mátar verður mælt til, at verandi lániskipan heldur fram óbroytt.

2.6 Fyrisiting, kærumøguleikar o.a.
2.6.1 Lýsing av verandi skipan
Stuðulsstovnurin umsitur útbúgvingarstuðulin samsvarandi L.l. 109 frá 15/09-1988 sum broytt við L.l. nr. 43 frá 30/03-1990. Sambært §9 stk. 1 í hesi lóg eigur landsstýrið at áseta nærri reglur fyri stovnin.

3-manna kærunevndin, ið hevur hægsta fyrisitingarliga vald, verður sett av landsstýrinum 4. hvørt ár.

2.6.2 Viðmerkingar til verandi skipan
Verandi fyrisiting virkar væl, og nevndin mælir ikki til lógarbroytingar á hesum øki.

3. Uppskot til nýggja lóg um útbúgvingarstuðul

Kapitul 1
Endamál við Útbúgvingarstuðlinum

§ 1 Endamálið við útbúgvingarstuðlinum sambært hesi lóg er at gera tað fíggjarliga møguligt hjá øllum borgarum í Føroyum at nema sær útbúgving.

Kapitul 2
Stuðulsskipanir og upphæddir

§ 2 Tey sum eru yvir 18 ár, fáa í mesta lagi fylgjandi útbúgvingarstuðul í einum stuðulsári:

Heimabúgvandi	22.000 kr.
Útibúgvandi	33.000 kr.

Stk. 2. Tann, ið er í útbúgving, og sum er 18 ár ella eldri, kann í stuðulsárinum fáa lestrarlán upp til 22.000 kr.

Stk. 3. Lesandi á hægri útbúgvingum og lesandi, sum eru forsyrgjarar, verða altíð roknað sum útibúgvandi.

Stk. 4. Tann, sum er í útbúgvning og er yngri enn 18 ár, kann í stuðulsárinum fáa upp til 2.000 kr. í skoylisstuðli til keyp av undirvísingartilfar.

Stk. 5. Stuðulsstovnurin kann áseta nærri reglur fyri um treytirnar fyri at vera roknaður sum heimabúgvandi og útibúgvandi, ej stuðulstíðina.

Kapitul 3
Stuðulstreytir

§ 3. Stuðulsstovnurin veitir sambært umsókn stuðul til fólk í útbúgving sum:

1) eru í einari útbúgving í Føroyum, sum av Stuðulsstovninum er stuðulsheimilað smb. kunngerð.

2) eru føroyingar ella hava annan ríkisborgararætt enn tann føroyska/danska, og viðkomandi, áðrenn hann er fyltur 20 ár, hevur tikið fastan bústað saman við foreldrunum í Føroyum, ella um hann, eftir at hava fylt 20 ár, hevur havt fastan bústað í Føroyum minst tvey samanhangandi ár, áðrenn farið verður undir útbúgvingina.

3) eru lestrarvirkin í Føroyum

4) Ikki fáa annan almennan stuðul, ið er ætlaður til livikostnað.

Stk. 2. Stuðulsstovnurin kann áseta nærri reglur fyri útbúgvingarstuðli til fólk í útbúgving, ið fáa aðra almenna hjálp og kann í hesum sambandi áseta, at hesi ikki fáa lestrarlán.

Stk. 3. Stuðulsstovnurin kann áseta nærri reglur fyri at veita stuðul, tá ið talan er um norðurlendskt, evropeiskt ella ulheims lestrarsamarbeiði.

Kapitul 4
Regulering av stuðulsupphæddum

§4. Stuðulsstovnurin veitir útbúgvingarstuðut og lán, sum fyri tann einstaka so vítt møguligt skal samsvara við tær upphæddir, viðkomandi hevur rætt til.

Stk. 2. Stuðulsstovnurin kann steðga ella broyta útgjaldan av upphæddum, um broytingar henda í viðurskiftum hins lesandi, ið hava ávirkan á stuðulsveitingina. Stuðulsstovnurin kann áseta reglur um hetta.

Stk. 3. Upphæddir, ið eru goldnar fyri mánaðir har stuðulsmóttakarin ikki lýkur stuðulstreytirnar, skulu verða kravdar aftur. Stuðulsstovnurin kann áseta reglur um hetta.

Kapitul 5
Rentan og afturrindan av lestrarláni

§ 5. Endaligt veitt lestrarlán samb. § 6. stk. 1 verður at renta í útbúgvingartíðini við eini árligari rentu, sum er 4%. Síðani rentar upphæddin eftir lokna útbúgving við 1% omanfyri ta til eina og hvørja tíð gildandi diskonto. Stuðulsstovnurin ásetir reglur um útbúgvingartíðina, um hvørjar fylgjur steðgur í útbúgvingini fer, og um skyldu lántakaranna at geva upplýsingar um hetta.

Stk. 2. Afturrindan av lestrarláni, eisini afturrindan av rentum, skal vanliga byrja 1 ár aftaná, at tað stuðulsárið er úti, har ið útbúgvingin er lokin. Stuðulsstovnurin kann áseta reglur um afturrindan av lestrarlánum.

Stk. 3. Um lántakari doyr, áðrenn lánið er afturgoldið kann restskuldin verða strikað.

§ 6. Um lántakarin ikki lýkur lánitreytirnar kann skuldin sigast upp til skaðaleysa afturrindan.

Stk. 2. Krøv smb. stk. 1 verða fyrisitin av Føroya Gjaldstovu, ið innkrevur skuldina.

Stk. 3. Føroya Gjaldstova ásetur rentuafturgjaldstreytir fyri uttskildin lestrarlán.

Stk. 4. Heimilað verður Føroya Gjaldstovu at innkrevja tað, Stuðulsstovnurin hevur til góðar, um borgarin verður effektiv, við rentum við at afturhalda løn o.a. hjá lántakaranum, sambært reglunum fyri innkrevjan av persónsskatti í samtíðarskattalógini.

Kapitul 6
Fyrisiting, kærumøguleiki o.a.

7. Stuðulsstovnurin fyrisitur útbúgvingarstuðulin. Føroya Landsstýri ásetur nærri reglur fyri stovnin.

Stk. 2. Stuðulsstovnurin fær heimild til at fáa tær

upplýsingar um tann einstaka umsøkjaran frá almennum myndugleikum, ið eru neyðugar fyri at útrokna stuðulin.

Stk. 3. Stuðulsstovnurin kann áseta reglur um innihald og uppsetan av umsóknum, lániskjølum o.ø., um útgjalding av stuðuli, um hvørjar upplýsingar, ið kunnu krevjast skrivliga, og um freistir fyri umsóknir, inngjaldingar og fráboðanir.

Stk. 4 Fólk í útbúgving skulu geva upp navn, bústað og persónstal, tá ið søkt verður um stuðul og tá ið tey annars venda sær til Stuðulsstovnin.

§ 8. Landsstýrið kann avgera, at Stuðulsstovnurin skal fyrisitast saman við ella av øðrum almennum stovni.

§ 9. Avgerð tikin av Stuðulsstovninum um:

1) grundarlagið fyri veitan og útroknan av stuðuli til fólk í útbúgving ella

2) at ein stuðulstakari skal afturrinda stuðul, kann áðrenn 6 vikur eru ginguar, eftir at boðað er frá avgerðini, kærast til Kærunevndina hjá Stuðulsstovninum av tí, ið avgerðin viðvíkur. Avgerð kærunevndarinnar er endalig innan fyrisitingina.

Stk. 2. Landsstýrið setir kærunevnd við 3 limum. Formaðurin skal vera løgfrøðingur. Limirnir verða settir fyri 4 ár í senn. Landsstýrið kann áseta reglugerð fyri kærunevndina.

§ 10. Landsstýrið kann áseta nærri reglur fyri almennan útbúgvingarstuðul, ið ikki kemur undir hesa lóg.

Stk. 2. Stuðulsstovnurin fyrisitur almennan útbúgvingarstuðul, ið ikki kemur undir hesa lóg.

§ 11. Henda lóg fer gildi 01.08.98 og samstundis fer Løgtingslóg nr. 109 frá 15.09.1998 um útbúgvingarstuðul sum broytt við L.l. Nr. 43 frá 30.03.1990 úr gildi. Lógin eigur at verða endurskoðað av umboðum fyri næmingar, lestrarvegleiðarar og Stuðulsstovnin, tá ið eitt ár er umliðið.

4. Fíggjarligur kostnaður av uppskotinum

Í brotið 2.3.3 mælir arbeiðsbólkurin til, at lesandi undir 18 ár ikki longur fáa útbúgvingarstuðul til livikostnað. Samstundis verður mælt til, at hesi somu fáa fiskoytisstuðul til útreiðslur, sum standast av beinleiðis undirvísingartiltøri og ferðing, eins og serligur stuðul eigur at verða latin teimum, sum verða noydd at flyta til útbúgvingarstaðin.

Fyri tey, sum eru yvir 18 ár, verður mælt til, at:

- heimabúgvandi fáa kr. 2.000 í stuðuli og kr. 2.000 í lán
- útibúgvandi fáa kr. 3.000 í stuðuli og kr. 2.000 í lán

Mælt verður til, at øll lesandi, sum eru foreldur, og øll lesandi við hægri læristovn altíð verða roknað sum útibúgvandi.

Arbeiðsbólkurin hevur við støði í bagtølunum fyri lesandi í Føroyum, sum eru at finna í fylgiskjali nr. 6.2, roknað sparingarnar og meirkostnaðin av omanfyri nevndu broytingum. Hesar eru lýstar í niðanfyristandandi talvu. Viðmerkjast skal, at næmingatalið, fyri ferðaískoyti og avbygdaískoyti, er mett, og eigur tí at takast við fyrivarni.

	Tal av næm	Stuðul um árið gomul lóg	Stuðul um árið nýggj lóg	Kostn. um árið gomul lóg	Kostn. um árið nýggj lóg	Munur um árið
ÚS-grundstuðul						
Undir 18 ár heimab.	238	7.303	0	1.741.015	0	1.741.015
Undir 18 ár útib.	93	16.430	0	1.527.754	0	1.527.754
Yvir 18 ár heimab.	685	17.343	22.000	11.883.789	15.074.863	-3.191.074
Yvir 18 ár útib.	1.003	26.471	33.000	26.560.897	33.112.070	-6.551.173
Tilsamans	**2.020**			**41.713.455**	**48.186.933**	**-6.473.478**
ÚS-ískoytisstuðul						
Bóka ískoyti	331		1.500	0	497.074	-497.074
Ferðaískt. avb. næm.	50		13.200	0	660.000	-660.000
Ferðaískoyti	300		4.400	0	1.320.000	-1.320.000
Tilsamans	**681**				**2.477.074**	**-2.477.074**
Tilsamans				**41.713.455**	**50.664.007**	**-8.950.552**

Broytingaruppskotini, sum arbeiðsbólkurin mælir til, eru mett at hava við sær ein meirkostnað uppá kr. 8.950.552 um árið. Meirkostnaðurin kann sundurgreinast í triggjar bólkar:

1.	Iesandi undir 18 ár fáa ikki longur grundstuðul	kr.	3.268.769
2.	hækkingin í stuðulsupphæddunum til tey lesandi yvir 18 ár	kr.	-9.742.247
3.	ískoytisstuðul til avbygdanæmingar, ferðing og undirvísingartilfar	kr.	-2.477.074

At meta um fíggjarligu avleiðingarnar av øktu lánimøguleikunum er eitt sindur torføruri. Hetta kemst av, at trupult er at meta um støðuna hjá teimum sum í dag fáa. Av teimum uml. 1.688 lesandi, sum í dag hava møguleika fyri at lána, eru uml. 210 sum nýta møguleikan.

Møguleiki er fyri, at ein partur av teimum, sum í dag taka lán, ikki longur hava tørv á láni, um studningurin hækkar. Hinvegin kann eisini hugsast, at ein partur av teimum, sum í dag taka lán, hava tørv á meiri peningi og tískil vilja bróka økta lántmøguleikan. Arbeiðsbólkurin metir, at ikki verður neyðugt við hægri játtan, um lánimøguleikarnir verða øktir samsvarandi tilmæli arbeiðsbólksins. Hetta skal tó takast við fyrivarni.**5. Verandi reglugerð og uppskot til broytingar**

5.1 Lýsing av verandi reglugerð

Verandi reglugerð hevur heimild í ymiskum greinum í lógini, har tilskilað verður, at Studulsstovnurin kann áseta nærri reglur. Neyðugt er við hesum heimildum m.a. soleiðis, at umsitingin av lógini kann verða meira liðilig, eins og at tað eru møguleikar fyri eini neyvari áseting í reglugerðini í mun til lógina.

Reglugerðin kann eisini dagførast, tá ið hetta gerst neyðugt, uttan at hetta skal leggjast fyri lóggávumyndugleikarnar.

5.2 Viðmerkingar til verandi reglugerð

Arbeiðsbólkurin hevur í hesum broti valt bert at gera viðmerkingar til nakrar av reglunum, sum arbeiðsbólkurin metir eiga at verða broyttar. Hetta er gjørt niðanfyri.

Viðmerking til kapitul 1, grein 2: Útbúgvingarstovnarnir hava ymiskar treytir fyri, hvat tað merkir at vera lestrarvirkin, og eigur hetta at vera meira nágreiniliga allýst í reglugerðini.

Viðmerking til kapitul 1, grein 3: Uppbýtið í hægri útbúgvingar og ungdómsútbúgvingar er ikki tíðarhóskandi, og eigur nýtt uppbýti at verða gjørt.

Viðmerking til kapitul 5, grein 15: Av tí at eitt lestrarár er 11 mánaðir , eigur útbúgvingarstuðulin at vera útgoldin 11 ferðir um árið.

Aðrar smávegis broytingar eru eisini gjørdar, sum ongar viðmerkingar eru til. Ilesar eru innskrivaðar í broytingaruppskotið til nýggja reglugerð í brotið 4.3.

5.3 Uppskot til nýggja reglugerð

Við heimild í § 2, stk. 6, litra a, c, d og e, § 4, stk. 1 nr. 1 og 2 og stk. 2, § 5, stk. 2 og § 7, stk. 2 í løgtingslóg xxx hevur Studulsstovnurin fyrisett:

Kapitul 1
Hvør, ið hevur rætt til studul.

§ 1. Studulsstovnurin veitir eftir umsókn studul til fólk í útbúgving, um tey:
1) Eru lestrarvirkin smb. § 2
2) Eru í útbúgving, sum gevur rætt til studul smb. § 3

§ 2. Persónur í útbúgving er lestrarvirkin, til tað við royndum ella á annan hátt verður mett, at hann ikki kann standa endaligar royndir, uttan at lestrartíðin verður longd munandi.
Eisini skal persónur í útbúgving møta upp til frálæru eftir teimum reglum, sum eru galdandi á útbúgvingarstovtinum, lata inn kravdar uppgávur og fara til

ger kravdu royndirnar/prøvtokurnar samhæri lesi ætlanum.

§ 3. Ein útbúgving í Føroyum gevur rætt til at fáa stuðul, tá ið hon:

1) Er ein hægri útbúgving.
2) Er ein viðurkend styttri vinnuførleikagevandi útbúgving ella ein viðurkend miðnámsútbúgving.
3) Útbúgving á framhaldsdeildarstigi fyri fólk eldri enn 18 ár
4) Er skipað sum heiltíðarlestur.
5) Er ólønt, jbr. tó § 5.

Stk. 2. Hægri útbúgvingar eru: útbúgvingar á Fróðskaparsetri Føroya, lærara-, námsfrøðilig-, maskinmeistara-, sjúkrasystra- og skipsføraraútbúgving.

Stk. 3. Styttri vinnuførleikagevandi útbúgvingar og viðurkendar miðnámsútbúgvingar eru: motorpassara-, kokka-, heimaskipara- og sosial-og sundheitshjálparaútbúgving, FHS-, students- og HF-útbúgving, hægri handilsskúla-, fiskivinnu- og SFT-útbúgving.

§ 4. Fyri útbúgvingar nevndar í §3 stk. 3. og 4. er kravið um heiltíðarlestur lokið, um tann lesandi hevur minst 20 lestrartímar um vikuna.

§ 5. Fólk í útbúgving, sum fáa lon ein part av útbúgvingartíðini, kunnu fáa stuðul í tí ólønta tíðarskeiðinum, um tey ikki fáa lon í minsta lagi í tríggjar fylgjandi mánaðir í einum stuðulsári. Fáa tey lon fyri minni enn tríggjar mánaðir í einum stuðulsári, hava tey rætt til at fáa stuðul alt árið.

§ 6.Rætt til stuðul sum útibúgvandi hevur persónur, ið kann skjalprógva útreiðslur av egnum bústaði.

Stk. 2. Persónur, ið byr á sama matr. nr. sum foreldur/verjar, verður vanliga roknaður at búgva hesum.

Stk. 3. Stuðulsstovnurin kann gera undantak frá reglunni í stk. 2.

Kapitul 2
Stuðulstreytir fyri útlendingar í Føroyum.

§ 7. Stuðul verður veittur út frá somu fortreytum, sum tá føroyingar, til fólk í útbúgving, sum hava ein annan ríkisborgararætt enn tann føroyska/ danska, um viðkomandi, áðrenn hann fyllti 20 ár, hevur tikið fastan bústað saman við foreldrunum í Føroyum.

§ 8. Útlendskir ríkisborgarar fáa út-búgvingarstuðul, tá teir hava búð í Føroyum í minst tvey fylgjandi ár, áðrenn farið verður undir útbúgvingina.

§ 9. Ríkisborgarar úr øðrum Norður-londum undantikið Danmark kunnu bert fáa stuðul, um eingin mogudeiki er at fáa stuðul úr heimlandinum

Stk. 2. Stuðulsstovnurin kann í serligum førum gera undantak frá reglunni í stk. 1.

Kapitul 3
Stuðulstíðin

§ 10. Næmingar í útbúgvingum, har útbúgvingartíðin er 2 ár ella longri, fáa í mesta lagi útbúgvingarstuðul upp til eitt ár, eftir at ásetta lestrartíðin er lokin.

Stk. 2. Upp í lestrartíðina fyri hesa útbúgving verður roknað tilmeldingarskeið á hægri útbúgvingum, ið áður eru lokmar ella steðgaðar, um umsøkjarin hevur fingið útbúgvingarstuðul ella stuðul frá Statens Uddannelsesstotte.

Stk. 3. Stuðulsstovnurin kann gera undantak frá reglum í stk. 1, um lestrartíðin er vorðin longd vegna ráðsarbeiði, sjúku, barnsburð, vísindaligt arbeiði o.a.

Kapitul 4
Ískoytisstuðul

§ 11. Ískoytisstuðul til ferðing til og frá skúla verður veittur til lesandi, sum ikki búgva í tí kommunu, har útbúgvingarstaðið er. Stuðulin eigur at fylgja tí til eina og hvørja tíð galdandi kostnaði við almennum flutningstólum.

§ 12. Lesandi, sum ikki hava mogudeika at ferðast millum heim og útbúgvingarstað dagliga, verða bólkað sum avbygdanæmingar við rætti til ískoytisstuðul. Fyri fult stuðulsár er hesin stuðul 13.200 kr. Í annex I til hesa reglugerð er yvirlit yvir tey øki, har lesandi hava rætt til avbygdanæmingastuðul.

Stk. 3. Lesandi undir 18 ár kunnu velja, um tey vilja bólkast sum avbygdanæmingar sambært § 12, treytað av, at tey flyta til útbúgvingarstaðið.

Kapitul 5
Hvussu stuðulin verður roknaður.

§ 13. Stuðulstíðin er tann partur ella teir partar av stuðulsárinum, tá ið tann, ið er undir útbúgving, hevur rætt til stuðul (smb. § 4 í løgini)

Stk. 2. Er stuðulstíðin styttri enn eitt ár, verður stuðulsupphæddin lækkað lutfalsliga.

§ 14. Fyllir persónur 18 ár í stuðulsárinum, kann hann fáa lestrarlán, ið svarar til ta tíðina, ið eftir er av stuðulsárinum.

§ 15. Persónar, sum fáa aðra almannahjálp til livikostnað so sum endurútbúgving, kunnu ikki fáa lestrarlán.

Kapitul 6
Um útgjalding av útbúgvingarstuðli.

§ 16. Fólk í útbúgving kunnu í mesta lagi søkja um

útbúgvingarstuðul fyri eitt ár í senn. Er útbúgvingin byrja áðrenn 15. apríl, skulu umsóknarblaðini sendast Stuðulsstovninum í seinasta lagi 15. mai í stuðulsárinum.

Stk. 2. Byrjar útbúgvingin seinni enn 15. apríl, ásetir Stuðulsstovnurin fyri hvørja einstaka útbúgving eina seinasta freist fyri innflygging av umsóknarblaðnum.

§ 17. Førnya Gjaldstova flytir 1/11 av upphæddini til studning og lestrarlán seinast í hvørjum mánaði á konto í peningastovni, á giro ella við post-ávísing. Fyrsta útgjaldingin av lestrarláni verður flutt, tá ið Stuðulsstovnurin hevur fingið tað undirskrivaða lániskjalið.

Kapitul 7
Broyting í stuðuli.

§ 18. Stuðulsupphæddirnar verða broyttar, um umsøkjarin flytur heim ella heimanífrá. Broytingin verður at rokna frá tí fyrsta í mánaðinum flutt verður.

§ 19. Um persónurin, ið fær stuðul, gevst við útbúgvingini, ella missir hann av aðrari orsøk rættin til stuðul, dettur stuðulin burtur frá tí fyrsta í tí mánaði, broytingin hendir.

Kapitul 8
Afturgjaldingartreytir fyri lestrarlán.

§ 20. Tann lesandi byrjar vanliga at gjalda aftur lestrarlán og rentur eitt ár aftaná, at útbúgvingin er lokin.

Stk. 2. Útbúgvingin verður ikki sogd at verða lokin, um tann lesandi innan 12 mánaðir eftir hesa útbúgving byrjar eina aðra útbúgving. Tað sama er galdandi, um ein fyribils steðgað útbúgving verður tikin uppaftur innan fyri sonu tíðarfreist. Stuðulsstovnurin kann gera undantak frá hesum ásetingum

Stk. 3. Stuðulsstovnurin kann gera av, at lestrarlánið skal verða goldið aftur, hóast útbúgvingin ikki er lokin, um lántakarin ikki longu er lestrarvirkin (sbr. tó 1. og 2. stk.)

§ 21. Afturgjalding av lestrarláni við roknaðum rentum fer fram við líka stórum gjøldum annan hvønn mánað.

Stk. 2. Gjaldsupphæddin verður ásett av Stuðulsstovninum í mun til skuldina. Afturgjaldstíðin er í mesta lagi 15 ár. Hvørt gjaldið skal í minsta lagi verða 300 kr.

Kapitul 9
Upplýsingarskylda.

§ 22. Fólk í útbúgving, sum fáa stuðul eftir løgtingslóg um útbúgvingarstuðul, skulu beinanvegin skriviliga boða Stuðulsstovninum frá, tá ið tey:

1) Steðga ella verða líðug við útbúgvingina, um hetta ikki sæst í umsóknini.

2) Steðga við eini útbúgving fyri at byrja uppá eina aðra útbúgving í sama stuðulsári.

3) Fáa farloyvi

4) Fáa løn eina tíð sum lið í útbúgvingini, og hetta ikki sæst í umsóknini, jbr. tó § 5.

5) Fáa annan almennan stuðul, ið er ætlaður til at gjalda lívikostnað.

6) Flyta heim at búgva.

7) Ikki lungur eru í heiltíðarútbúgving.

Stk. 2. Fólk í útbúgving, ið hava fingið lán, hava skyldu til skriviliga at boða Stuðulsstovninum frá, tá ið:

1) útbúgvingin er lokin, ella tey gevast at lesa,

2) farið verður uttanlands í lestrarørindum,

3) steðgur annars verður í lestrinum.

§ 23. Reglurnar eru galdandi frá 01.08.1998.

6. Fylgiskjøl

6.1 Yvirlit yvir stuðulsskipanirnar í hinum Norðurlondunum

6.1.1 Danmark

- Eingin stuðul verður latin til lesandi undir 18 ár.
- Lesandi á miðnámsútbúgvingum millum 18 og 20 ár fáa sum grunduppheedd kr. 1.147 um mánaðin við møguleika fyri einum ískoyti upp til kr. 1.807. Ískoytið er tengt at inntøkuni hjá foreldrunum.
- Lesandi á miðnámsútbúgvingum millum 18 og 20 ár verða øll skrásett sum heimabúgvandi, uttan so at teinurin millum húðstaðin hjá foreldrunum og skúlan er longri enn 20 km, ella at ferðatíðin er meiri enn 75 minuttir ein veg. Um tey lúka treytirnar fyri at verða skrásett sum útibúgvandi, fáa tey sum grunduppheedd kr. 2.293 um mánaðin við møguleika fyri einum ískoyti upp til dkr. 3.580. Ískoyti er tengt at inntøkuni hjá foreldrunum.
- Lesandi frá 20 árum og uppeftir fáa, um tey eru heimabúgvandi, kr. 1.807 um mánaðin og kr. 3.580, um tey eru útibúgvandi.
- Øll, sum lesa við hægri læristovn, fáa hægstu upphæddina kr. 3.580 um mánaðin, eisini um tey eru undir 20 ár ella búgva heima hjá foreldrunum.

- Lesandi yvir 18 ár kunnu taka lán upp á kr. 1.860 um mánaðin.
- Studningurin verður roknaður sum a-inntøka.
- Útbúgvingarstuðul verður latin í 12 mánaðar.

Viðmerking:
Lesandi við børnum fáa umframt SU barnastuðul, sum gevur uml. kr. 800 fyri hvørt barnið. Lesandi, sum búgva til leigu, hava møguleika fyri at fáa stuðul til leigutreiðslur (boligsikring).

6.1.2 Noregi

- Lesandi undir 19 ár fáa studning til miðnámsútbúgvingar í samsvari við inntøku foreldranna og talið av syskjum.
- Lesandi undir 19 ár, har foreldrini búgva meira enn 40 km frá skúlanum, ella har dagliga ferðingin tekur meiri enn 3 tímar, fáa ferðaískoyti upp á nok. 1.980 um mánaðin.
- Lesandi yvir 19 ár, sum eru heimabúgvandi, fáa nok. 3.800 í lánsmøguleika um mánaðin.
- Lesandi yvir 19 ár, sum eru útibúgvandi, fáa umframt grundupphæddina upp á nok. 3.800, í lánsmøguleika nok. 1.980 í studningi um mánaðin.
- Eyka ískoyti kann fáast til bøkur (nok. 245 ella nok. 490 til ávikavist miðnáms- og hægri útbúgvingar).
- Eyka ískoyti kann fáast til børn (48,5% er studningur 51,5% er lán). Ískoytið til fyrsta barnið er nok. 1.140, næsta barnið nok. 1.140 og tey fylgjandi nok. 700 um mánaðin. Hetta ískoytið fellur tó burtur, um inntøkan hjá hjúnafelaga verður ov stór.
- Útbúgvingarstuðul verður latin í 10 mánaðar.

6.1.3 Ísland

- Útbúgvingarstuðulin verður bara latin sum lán.
- Eingin lesandi fær stuðul, fyrrenn hann er fyltur 20 ár. Undantikin eru tey, sum lesa við hægri lærostovn.
- Lesandi yvir 20 ár, sum er heimabúgvandi, fær í lánsmøguleika iskr. 38.220.
- Lesandi yvir 20 ár, sum er útibúgvandi, fær í lánsmøguleika iskr. 54.600.
- Eyka ískoyti (lán) upp á 25% av grundupphæddini verður latið fyri hvørt barnið (um lesandi er einligur forsyrgjari, er ískoytið tó 45%).
- Annað ískoyti (lán) verður latið til bøkur, ferðing, skúlagjald, rentuútreiðslur v.m.

6.2 Hagtøl yvir lesandi í Føroyum

Lesandi sum fáa ÚS-stuðul, skipa eftir aldri og bústaði (juni 1997 og august 1997)

		<18 ár			>18 ár		
	jun-97*	Heima	Úti	Tils.	Heima	Úti	Tils.
Fiskivinnuskúlin í Vestmanna	35	1	2	3	4	28	32
Føroya Studentaskúli og HF-skeið	538	107	39	146	223	169	392
Klaksvíkar HF-skeið	48	0	0	0	20	28	48
Studentaskúlin og HF-skeiðið í Kambsdali	267	49	10	59	129	79	208
Suðuroyar Miðnámsdepil	105	15	6	21	54	30	84
Føroya Handilsskúli, Kambsdalur	146	21	7	28	58	60	118
Føroya Handilsskúli, Tórshavn	230	26	13	39	71	120	191
Føroya Læraraskúli	138	0	0	0	9	129	138
Maskinmeistaraskúlin	136	1	0	1	21	114	135
Sjúkrasystraskúlin	42	0	0	0	19	23	42
Føroya Sjómannaskúli	164	0	0	0	29	135	164
Klaksvíkar Sjómannaskúli	40	1	4	5	6	29	35
Tekniski skúli í Klaksvík	78	13	8	21	26	31	57
Tekniski skúli í Tórshavn	49	6	5	11	17	21	38
Fróðskaparsetur Føroya	40	0	0	0	7	33	40
Samanlagt	**2.056**	**240**	**94**	**334**	**693**	**1.029**	**1.722**

	aug-97*	<18 ár Tils.	>18 ár Tils.
Fiskivinnuskúlin í Vestmanna	29	2	27
Føroya Studentaskúli og HF-skeið	523	152	371
Klaksvíkar HF-skeið	46	0	46
Studentaskúlin og HF-skeiðið á Kambsdali	252	63	189
Suðuroyar Miðnámsdepil	104	23	81
Føroya Handilsskúli, Kambsdalur	136	38	98
Føroya Handilsskúli, Tórshavn	256	65	191
Føroya Læraraskúli	163	0	163
Maskinmeistaraskúlin	106	0	106
Sjúkrasystraskúlin	59	0	59
Føroya Sjómansskúli	116	0	107
Klaksvíkar Sjómansskúli	20	9	20
Tekniski skúli í Klaksvík	97	35	62
Tekniski skúli í Tórshavn	40	12	28
Fróðskaparsetur Føroya	37	0	37
Samanlagt	**1.984**	**399**	**1.585**

6.3 Løgtingslóg nr. 109 frá 15. 09. 1988 um útbúgvingarstuðul (sum broytt við L.l. nr. 43 frá 30. 03.1990)

Kapitul 1
Stuðulsskipanir og upphæddir.

§ 1. Stuðulsstovnurin veitir útbúgvingarstuðul sum lestrarstudning og lestrarlán.

§ 2. Í stuðulsárinum 1989/90 kann tann, ið er í útbúgving í mesta lagi fáa fylgjandi útbúgvingarstuðul:

Heimabúgvandi undir 18 ár	7.641 kr.
Heimabúgvandi yvir 18 ár	18.146 kr.
Útibúgvandi undir 18 ár	17.191 kr.
Útibúgvandi yvir 18 ár	27.696 kr.

Í stuðulsárinum 1990/91 og seinni stuðulsár kann tann, ið er í útbúgving, í mesta lagi fáa fylgjandi útbúgvingarstuðul:

Heimabúgvandi undir 18 ár	7.303 kr.
Heimabúgvandi yvir 18 ár	17.343 kr.
Útibúgvandi undir 18 ár	16.430 kr.
Útibúgvandi yvir 18 ár	26.471 kr.

Stk. 2. Tann, ið er í útbúgving, og sum er 18 ár og eldri, kann í stuðulsárinum 1990/91 og seinni stuðulsár fáa lestrarlán úr landskassanum upp til 13.692 kr.

Stk. 3. Stuðulsárið er frá 1. august til 31. juli.

Stk. 4. Stuðulsstovnurin kann áseta nærri reglur fyri: a) hvørjar undantaksútbúgvingar ið geva rætt til stuðul. b) nærri treytir fyri stuðul til hægri útbúgvingar. c) um útrokning av stuðuli fyri styttri tíðarskeið enn eitt ár. d) um treytirnar fyri at vera roknaður sum heimabúgvandi og útibúgvandi. e) stuðulstíðina.

§ 3. verður strikað.

Kapitul 2
Stuðulstreytir

§ 4. Stuðulsstovnurin veitir sambært umsókn útbúgvingarstuðul til fólk í útbúgving sum:

1) eru í einari útbúgving í Føroyum, sum av stuðulsstovninum er stuðulsheimilað smb. kunngerð,

2) eru føroyingar ella sum sambært altjóða sáttmála hava rætt til útbúgvingarstuðul á javnum føti við føroyingar ella sum av Stuðulsstovninum í sambandi við stuðulsveitingina verða javnsett við føroyingar,

3) eru lestrarvirkin í Føroyum og

4) ikki fáa annan almennan stuðul, ið er ætlaður til at gjalda livikostnað.

Stk. 2. Stuðulsstovnurin kann áseta reglur fyri útbúgvingarstuðli til fólk í útbúgving, ið fáa aðra almenna hjálp og kann í hesum sambandi áseta, at hesi ikki kunnu fáa lestrarlán.

Stk. 3. Stuðulsstovnurin kann áseta nærri reglur fyri at veita stuðul, tá tatað er um norðurlendskt, europeiskt ella alheims lestrarsamarbeiði av líkum slagi, sum ERASMUS og Nordplus skipanirnar.

Kapitul 3
Fyribils og endaligar stuðulsupphæddir

§ 5. Stuðulsstovnurin veitir lestrarstudning og lesti

arlán í studulsárinum sum fyribils upphæddir, sum fyri tann einstaka so vítt møguligt skulu svara til tær upphæddirnar, ið viðkomandi hevur rætt til, tá ið studulsárið er úti.

Stk.2. Útgjaldan av fyribils upphæddum í studulsárinum verða framdar út frá upplýsingum um lestrarviðurskifti, annan almennan studul o.a. Studulsstovnurin ásetir reglur um hetta.

Stk. 3. Studulsstovnurin kann steðga ella broyta útgjaldan av fyribils upphæddum, um broytingar henda í studulsárinum í viðurskiftum, ið kunnu fáa munandi ávirkan á studulsveitingina. Studulsstovnurin kann áseta reglur um hetta.

Stk. 4. Fyribils upphæddir, ið eru goldnar fyri mánaðir, har studulsmóttakarin ikki lýkur studulstreytirnar, kunnu verða krævdar aftur, áðrenn tann endaliga veitingin av útbúgvingarstudulinum smb. § 6 verður framd. Studulsstovnurin kann áseta reglur um hetta.

§ 6. Endaliga veitingin av lestrarstudningi og lestrarláni verður framd, tá ið studulsárið er úti. Um studulstreytirnar smb. § 4 ikki hava verið loknar í studulsárinum, verður studulsupphæddin sett niður hlutfalsliga.

Stk. 2. Útgoldnar fyribils upphæddir, ið ikki endaliga kunnu veitast sum lestrarstudningur og lestrarlán smb. stk. 1, skulu gjaldast aftur.

Stk. 3. Tá ið studulsárið er úti, skal tann, ið er í útbúgving og sum hevur tikið ímóti upphæddum í studulsárinum, geva allar upplýsingar, ið eru neyðugar fyri at endaliga studulsveitingina.

Stk. 4. Lykur tann, ið er í útbúgving ikki upplýsingarskyldurna smb. stk. 3, verða tær útgoldnu fyribils upphæddirnar krævdar aftur. Kravið kann tá heilt ella partvíst falla burtur, um tann, ið er í útbúgving, kortini gevur upplýsingarnar, og um tað av teimum er greitt, at upphæddirnar kunnu veitast smb. stk. 1.

Kapitul 4
Rentan og afturrindan av lestrarláni

§ 7. Endaligt veitt lestrarlán smb. § 6, stk. 1 verður Við heimild í § 2, stk. 4, liðir a, c, d og e, § 4, stk. 1 nr. 1 og 2 og stk. 2, § 5, stk. 2 og § 7, stk. 2 í logtingslóg nr. 109 frá 15. september 1988 hevur Studulsstovnurin fyrisett:

frá og við 1. august 1990 at renta í útbúgvingartíðini við eini árligari rentu, sum er 4%. Síðani rentar upphæddin eftir lokna útbúgving við 1% omanfyri ta til eina og hvørja tíð galdandi diskonto. Studulsstovnurin ásetir reglur um útbúgvingartíðina, um hvørjar fylgjur steðgur í útbúgvingini fær, og um skyldu lántakarans at geva upplýsingar um hetta.

Stk. 2. Afturrindan av lestrarláni, eisini afturrindan av rentum, skal vanliga byrja 1 ár aftaná, at tað studulsárið er úti, har ið útbúgvingin er lokin. Studulsstovnurin kann áseta reglur um afturrindan av lestrarlánum.

§ 8. Um lántakarin ikki lýkur lánitreytirnar kann skuldin sigast upp til skaðaleysa afturrindan.

Stk. 2. Krav smb. stk. 1 verða fyrisitin av Studulsstovninum, ið innkrevar skuldina.

Stk. 3. Studulsstovnurin ásetir rentuafturgjaldstreytir fyri mishildin lestrarlán.

Kapitul 5
Fyrisiting, kærumøguleiki o.a.

Studulsstovnurin fyrisitur útbúgvingarstudulin. Føroya Landsstýri ásetir nærri reglur fyri stovnin.

Stk. 2. Studulsstovnurin fær heimild til at fáa tær upplýsingar um tann einstaka umsøkjaran frá almennum myndugleikum, ið eru neyðugar fyri at útrokna studulin.

Stk. 3. Studulsstovnurin kann áseta reglur um innihald og uppsetan av umsóknum, lániskjølum o.ø., um útgjalding av studli, um hvørjar upplýsingar, ið kunnu krevjast skrivligar, og um freistir fyri umsóknir, inngjaldingar og fráboðanir.

Stk. 4 Fólk í útbúgving skulu geva upp navn, bústað og persónstal, tá ið sókt verður um studul, og tá ið tey annars venda sær til studulsstovnin.

§ 10. Landsstýrið kann avgera, at Studulsstovnurin skal fyrisitast saman við ella av øðrum almennum stovni.

§ 11. Avgerðir tiknar av Studulsstovninum um:

1) grundarlagið fyri veitan og útroknan av studli til fólk í útbúgving og

2) at ein studulstakari skal afturrinda studul kunnu aðrenn 6 vikur eru gingnar, eftir at boðað er frá avgerðunum, kærast til Kærunevndina hjá Studulsstovninum av tí, ið avgerðin viðvíkur. Avgerð kærunevndarinnar er endalig innan fyrisitingina.

Stk. 2. Landsstýrið setir kærunevnd við 3 limum. Formaðurin skal vera logfrøðingur. Limirnir verða settir fyri 4 ár í senn. Landsstýrið kann áseta reglugerð fyri kærunevndina.

§ 12. Landsstýrið kann áseta nærri reglur fyri almennum útbúgvingarstudul, ið ikki kemur undir hesa lóg.

Stk. 2. Studulsstovnurin fyrisitur almennan útbúgvingarstudul, ið ikki kemur undir hesa lóg.

§ 13. Henda lóg fær gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

6.4 Reglugerð um útbúgvingarstudul, januar 1990.

Kapitul 1
Hvør, ið hevur rætt til studul.

§ 1. Studulsstovnurin veitir eftir umsókn studul til fólk í útbúgving, um tey:

1) Eru lestrarvirkin smb. § 2

2) Eru í útbúgving, sum gevur rætt til studul smb. § 3

§ 2. Persónur í útbúgving er lestrarvirkin til tað við royndum ella á annan hátt verður mett, at hann ikki

kann standa endaligar royndir, uttan lestrartíðin verður longd munandi.

§ 3. Ein útbúgving í Føroyum gevur rætt til at fáa studul, tá ið hon:

1) Er ein hægri úbúgving.

2) Er ein viðurkend ungdómsútbúgving.

3) Er skipað sum heiltíðarlestur.

4) Er ólønt, jbr. tó § 5

Stk. 2. Hægri útbúgvingar eru: Lærara-, námsfrøðilig-, maskinmeistara-, byggiteknikara-, sjúkrasystra. og skipsføraraútbúgving og útbúgvingar á Fróðskaparsetri Føroya.

Stk. 3. Ungdómsútbúgvingar eru: FHS-útbúgving, studenta- og HF útbúgving, hægri handilsskúli, motorpassara-, kokka-, heimaskipara- og fiskivinnuútbúgving og útbúgving til tekniskan hjálpara.

§ 4. Fyri ungdómsútbúgvingar er kravið um heiltíðarlestur lokið, um tann lesandi hevur mínst 20 lestrartímar um vikuna.

§ 5. Fólk í útbúgving, sum fáa løn ein part av útbúgvingartíðini, kunnu fáa studul í tí ólønta tíðarskeiðinum, um tey ikki fáa løn í minsta lagi í tríggjar fylgjandi mánaðir í einum stoðulsári. Fáa tey løn fyri minni enn tríggjar mánaðir í einum stoðulsári, hava tey rætt til at fáa studul alt árið.

§ 6. Sum útibúgvandi verður roknaður persónur, ið kann skjalprógva útreiðslur av egnum bústaði.

Stk. 2. Persónur, ið byr á sama matr. nr. sum foreldur/verjar, verður vanliga roknaður at búgva heima.

Stk. 3. Stuðulsstovnurin kann gera undantak frá regluni í stk. 2.

Kapitul 2
Studulstreytir fyri útlendingar í Føroyum.

§ 7. Studul verður veittur út frá somu fortreytum. sum til føroyingar, til fólk í útbúgving, sum hava ein annan ríkisborgararætt enn tann føroyska/ danska. um viðkomandi áðrenn hann fylti 20 ár, hevur tikið fastan bústað saman við foreldrunum í Føroyum.

§ 8. Útlendskir ríkisborgarar fáa út-búgvingarstudul. tá ið teir hava búð í Føroyum í minst tvey fylgjandi ár. áðrenn útbúgvingin er byrja, jbr. tó §7.

§ 9. Ríkisborgarar úr øðrum Norður-londum undantikið Danmark kunnu bert fáa studul. um eingin møguleiki er at fáa studul úr heimlandinum.

Stk. 2. Útlendingar annars kunnu bert fáa studul, um so er, at útbúgvingin ikki er stoðulsheimilað í heimlandinum, og teir ikki kunnu fáa útbúgvingarstudul úr heimlandinum.

Stk. 3. Stuðulsstovnurin kann í serligum førum gera undantak frá reglunni í stk. 2.

Kapitul 3
Stuðulstíðin

§ 10. Fólk í hægri útbúgving kunnu í mesta lagi fáa útbúgvingarstudul upp í eitt ár, eftir at ásetta lestrartíðin er lokin.

Stk. 2. Upp í lestrartíðina fyri hesa út-búgving verður roknað tilmeldingarskeið á hægri útbúgvingum, ið áður eru loknar ella steðgaðar, um umsøkjarin hevur lingið útbúgvingarstudul ella studul frá Statens Uddannelsesstøtte.

Stk. 3. Studulsstovnurin kann gera undantak frá reglunni í stk. 1, um lestrartíðin er vorðin longd vegna ráðsarbeiði, sjúku, barnsburð, vísindaligt arbeiði o.a.

Kapitul 4
Hvussu studulin verður roknaður.

§ 11. Studulstíðin er tann partur ella teir partar av studulsárinum, tá ið tann, ið er undir útbúgving, hevur rætt til studul (smb. § 4 í lógini)

Stk. 2. Er studulstíðin styttri enn eitt ár, verður studulsupphæddin lækkað lutfalsliga.

§ 12. Fyllir persónur 18 ár í studuls árinum, kann hann fáa lestrarlán, ið svarar til ta tíðina, ið eftur er av studuls-árinum.

§ 13. Persónar undir endurútbúgving kunnu ikki fáa lestrarlán. Studul til persónar undir endurútbúgving verður beinleiðis fluttur Almannastovuni.

Kapitul 5
Um útgjalding av útbúgvingarstuðuli.

§ 14. Fólk í útbúgving kunnu í mesta lagi søkja um útbúgvingarstudul fyri eitt ár í senn. Er útbúgvingin byrja áðrenn 15. apríl, skulu umsóknarblaðini sendast Studulsstovninum í seinasta lagi 15. mai í studulsárinum.

Stk. 2. Byrjar útbúgvingin seinni enn 15. apríl, ásetir Studulsstovnurin fyri hvørja einstaka útbúgving eina seinasta freist fyri innflygging av umsóknarblaðum.

§ 15. Føroya Gjaldstova flyir 1/12 av upphæddini til studning og lestrarlán seinast í hvørjum mánaði á konto í peningastovni. á giro ella við post-ávísing. Fyrsta útgjaldingin av lestrarláni verður flutt, tá ið Studulsstovnurin hevur fingið tað undirskrivaða lániskjalið.

Kapitul 6
Broyting í studuli.

§ 16. Studulsupphæddirnar verða broyttar, um umsøkjarin flytur heim ella heimanífrá. Broytingin verður at roknað frá tí fyrsta í mánaðinum, flutt verður.

§ 17. Um persónurin, ið fær studul, gevst við útbúgvinginí, ella missir hann av aðari orsøk rættin til studul, deltur studulin burtur frá tí fyrsta í tí mánaði, broytingin hendir.

Kapitul 7
Afturgjaldingartreytir fyri lestrarláni.

§ 18. Tann lesandi byrjar vanliga at gjalda aftur lestrarlán og rentur eitt ár aftaná, at útbúgvingin er lokin.

Stk. 2. Útbúgvingin verður ikki sagd at verða lokin.

um tann lesandi innan 12 mánaðir eftir hesa útbúgving byrjar eina aðra útbúgving. Tað sama er galdandi, um ein fyribils steðgað útbúgving verður tikin uppaftur innan fyri sonu tíðarfreist.

Stk. 3. Studulsstovnurin kann gera av, at lestrarlánið skal verða goldið aftur, hóast útbúgvingin ikki er lokin, um lántakarin ikki longur er lestrarvirkin (sbr. tó 1. og 2. stk.)

§ 19. Afturgjalding av lestrarláni við roknaðum rentum fer fram við líka stórum gjøldum annan hvønn mánað.

Stk. 2. Gjaldsupphæddin verður ásett av Studulsstovninum í mun til skuldina. Afturgjaldstíðin er í minsta lagi 4 ár, og í mesta lagi 15 ár. Hvørt gjaldið skal í minsta lagi verða 300 kr.

Kapitul 8
Upplýsingarskylda.

§ 20. Fólk í útbúgving, sum fáa studul eftir løgtingslóg um útbúgvingarstuðul, skulu beinanvegin skriviliga boða Studulsstovninum frá, tá ið tey:

1) Steðga ella verða liðug við útbúgvingina, um hetta ikki sæst í umsóknini.

2) Steðga við eini útbúgving fyri at byrja uppá eina aðra útbúgving í sama studulsári.

3) Fáa farloyvi

4) Fáa løn eina tíð sum lið í útbúgvingini, og hetta ikki sæst í umsóknini, jfr. tó § 5.

5) Fáa annan almennan studul, ið er ætlaður til at gjalda livikostnað.

6) Flyta heim at búgva.

7) Ikki longur eru í heiltíðarútbúgving.

Stk. 2. Fólk í útbúgving, ið hava fingið lán, hava skyldu til skrivliga at boða Studulsstovninum frá tá ið:

1) útbúgvingin er av, ella tey gevast at lesa,

2) farið verður uttanlands í lestrarorindum,

3) steðgur annars verður í lestrinum.

§ 21. Reglurnar eru galdandi frá 1. januar 1990.

Eiðil Samuelsen, landsstýrismaður Undirvísingar- og Mentamálastýrið, Posthoks 64, FO-110 Tórshavn

Viðvíkjandi álitinum um nýggja útbúgvingarstuðulsskipan (J.Nr. 214-23/97)

Vísandi til skriv aðalstýrisins dagfest 19. januar 1998 til MFS og LFÚ, skal fyrst verða takkað landsstýrismanninum í undirvísingarmálum fyri, at feløgini fáa møguleika at gera viðmerkingar til álitið um nýggja útbúgvingarstuðulsskipan.

MFS og LFÚ hava valt at gera felags viðmerkingar til álitið um nýggja útbúgvingarstuðulsskipan. Hetta val hava vit gjørt sum avleiðing av, at feløgini seinasta hálva árið hava samstarvað serliga nógv um útbúgvingarstuðulsspurningin.

Hjálagt er ummæli av álitinum um nýggja útbúgvingarstuðulsskipan. Ummæli umfatar m.a. eitt uppskot til nýggja útbúgvingarstuðulsskipan, sum MFS og LFÚ hava gjørt.

Mælt verður landsstýrismanninum í undirvísingarmálum til at seta hetta uppskot í verk heldur enn at fylgja tilmælinum frá arbeiðsbólkinum.

Uppskotið til útbúgvingarstuðulsskipan, sum MFS og LFÚ mæla til, kostar tað sama sum uppskotið hjá arbeiðsbólkinum. Uppskotið hjá MFS og LFÚ er eftir okkara tykki harumframt meira solidariskt.

Vinarliga vegna feløgini

Flóvin Eidesgaard,
formaður í MFS

Rói Jacobsen,
formaður í LFÚ

16. FEB. 1998

F. L. j. nr. 214 - 23/97

Tórshavn, 14.02.1998
Undirvísingar- og Mentamálastýrið, v/ Jákup Nielsen, fulltrúi, Tinganes, Postsmoga 6 L, FO- 110 Tórshavn

Tak for "álit um nýggja útbúgvingarstuðulsskipan", N.Nr.:214-23/97

Vi har ikke haft mulighed for at mødes alle studievejledere for fredag d.20.febr. og sender derfor dette foreløbige ummæli og ønsker at få mulighed for at snakke med udvalget mellem behandlingerne i Lagtinget.

Vi mener som helhed at udvalget og vores medlem der - Bjørg Róin - har gjort et godt stykke arbejde. Omlægningern af ÚS har været påkrævet længe bl.a. p.gr.a. prisudsudviklingen. Et fald på næsten 50% på de sidste 10 år taler sit tydelig sprog.

Omlægningen og udvidelsen af både støtten og lånemuligheden for de mere end 18-årige er et godt skridt i den rigtige retning, men der er tale om en for stor tilbagegang for de unge under 18 år! Fra næsten 7.000kr. til 2.000kr. Et fald på mere end 70%.

De unge under 18 år, der starter på en ungdomsuddannelse, bør have dækket de reelle startudgifter - primært bøger - detf) første år, hvilke ligger nærmere 4.000kr. end de foreslående 2.000kr. (I andre lande låner eleverne bøger på skolerne.)

Vi vil kraftigt anmode om, at beløbet til unge under 18 år forhøjes til 3.000kr. for de godt 350 personer, som det ca. drejer sig om, forde de 2.000kr. ikke dækker de faktiske udgifter til undervisningsmaterialer.

Det vil stadig være langt under halvdelen af det beløb som unge under 18 år får i dag, og forhøjelsen - ca. 350.000kr. betyder kun en stigning på 0.7% i den samlede udgift, hvilket ligger inden for de usikkerheder, man må kalkulere med i et sådant budget.

Venligst
Lestrarvegl. Felagið V/ Holger Arnbjerg, Box 3146 FO-110 Tórshavn

17. Feb. 1998
EL.j.nr. 2114-23/97

1. viðgerð hósdagin 12. mars 1998. Uppskotið verður beint í mentanarnevndina.

Málið fall burtur sbr. stýrisskipanarlógini § 15 stk. 3, tí at lagtingsval var 30. apríl 1998, og málið ikki var liðugt viðgjørt á tingi fyri valið.

EL. j.nr. 2114-23/97

Uppskot MFS og LFÚ til nýggja útbúgvingarstuðulsskipan

Arbeiði MFS og LFÚ við útbúgvingarstuðulsskipanini

Í samhandi við at kunngjørt varð í løgmansroðuni á ólavsøku 1997, at landsstýrismaðurin í undirvísingarmálum hevði sett ein bólk at endurskoða lógina um útbúgvingarstuðul, settu MFS og LFÚ sær fyri at arbeiða miðvist við spurninginum um nýggja útbúgvingarstuðulsskipan.

MFS og LFÚ vóru 27. august 1997 á fundi við arbeiðsbólkin, sum hevur gjørt álit um nýggja útbúgvingarstuðulsskipan. Undan hesum fundi og serliga síðani hevur verið samband millum feløgini um útbúgvingarstuðulsviðurskifti, og hevur MFS eisini viðgjørt útbúgvingarstuðul á limafundum.

Úrslitið er uppskot til útbúgvingarstuðulsskipan, sum verður greitt frá niðanfyri. MFS hevur staðfest uppskotið á ráðsfundi, og í LFÚ hevur nevndin staðfest uppskotið.

Lýsing av uppskotinum

Frágreiðingin er gjørd sum ein lýsing av broytingunum í mun til núverandi skipan.

Stuðulsskipanin í høvuðsheitum

Skipanin er soleiðis, at útbúgvingarstuðulsupphæddin verður fundin sum ein grundupphædd, sum øll lesandi fáa, umframt ymisk ískoyti, sum nøkur lesandi hava rætt til, alt eftir hvørjari støðu tey eru í.

Ískoytini eru: ískoyti til húsaleigu, ískoyti til egið húsarhald, aldursískoyti og ískoyti við hægri útbúgving. Hvørjar treytir eru fyri at fáa hesi ískoyti verður gjøgnumgingið niðanfyri.

Harumframt umfatar útbúgvingarstuðulsskipan MFS og LFÚ ískoyti til ferðing og ískoyti til undirvísingartilfar.

Treytir fyri ískoytum

Lesandi sum eru fylt 18 ár

Munur eigur at vera á upphæddunum til lesandi undir og yvir 18 ár. Tann lesandi gerst myndugur, og útreiðslurnar gerast fleiri. Stuðulsskipanin skal tí framhaldandi hava mun á upphæddunum til tey lesandi undir og yvir 18 ár. Men munurin á upphæddunum til tey undir og yvir 18 er ov stórur í verandi útbúgvingarstuðulsskipan.

Ein óheppin avleiðing er, at skipanin freistar fólk at bíða við at byrja útbúgving. Hetta avlagar lestrarmynstrið, og tí meta feløgini, at stóri munurin í upphæddunum til tey undir og yvir 18 ár í verandi stuðulsskipan ikki gevur øllum javnbjóðis møguleika at taka eina útbúgving.

Hægri útbúgving

Samstundis sum mælt verður til at minka muntin millum upphæddirnar til lesandi undir og yvir 18 ár, mæla vit til at gera mun á skúlastigunum. Lesandi á hægru skúlunum skulu hava hægri lestrarstuðul enn lesandi á ungdómsútbúgvingunum.

Vit skjóta upp eitt skúlastigsískoyti til lesandi á hægru útbúgvingunum. Við hesum ískoyti fáa tey eldru lesandi hægri útbúgvingarstuðul enn tey yngru, uttan at uppbýtið er so skarpt sum í uppskotinum frá arbeiðsbólkinum, og uttan at ov stórur munur verður gjørdur á lesandi sum ganga í sama flokki.

Skipanin hjá MFS og LFÚ er grundað á sama uppbýti millum ungdómsútbúgvingar og hægri útbúgvingar, sum arbeiðsbólkurin hevur gjørt í áliti sínum.

Egin bústaður

Lesandi sum hava útreiðslur av egnum bústaði eiga eftir MFS og LFÚ tykki at fáa ískoyti. Eitt ískoyti til húsaleigu, sum øll fáa, umframt eitt ískoyti til húsarhald sum tey yvir 18 ár fáa.

Undirvísingartilfar

Útbúgvingarstuðulsskipan MFS og LFÚ umfatar ískoyti til undirvísingartilfar á ungdómsútbúgvingunum. Hetta ískoyti skal útgjaldast eina ferð árliga, við lestrarársbyrjan.

Ferðing til skúlan

MFS og LFÚ skjóta upp, at lesandi sum hava ferðaútreiðslur vegna útbúgving, fáa hesar útreiðslur endurgoldnar.

Fleiri mátar eru at skipa fyri hesum, og skipanina sum arbeiðsbólkurin mælir til, kunnu MFS og LFÚ taka undir við.

Annað

Lestrarlán

MFS og LFÚ skjóta upp, at lesandi yvir 18 ár kunnu taka lestrarlán sum undir verandi skipan.

Foreldrainntøka, eginінntøka og skattur

Í uppskoti MFS og LFÚ til útbúgvingarstuðulsskipan skal hvørki eginінntøka ella foreldrainntøka ávirka stuðulin. Lesandi koma annars undir somu skattskyldu sum onnur, men sjálvur útbúgvingarstuðulin skal framhaldandi vera skattafríur. Sostatt hava lesandi ein botnfrádrátt um tey hava arbeiði aftaná skúlatíð ella í summarfrítíðini.

Studentapolitikkur

Tað skal framhaldandi vera møguligt at fáa longda studningstíð vegna studentapolitiskt arbeiði.

Longd stuðulstíð fyri studentapolitiskt arbeiði í ráðum, sum hoyra til útbúgvingarstovnin skulu framvegis umsitast av Stuðulsstovninum. Longd stuðulstíð fyri studentapolitiskt virksemi innanfyri studentafeløgini skal umsitast av studentafeløgunum sjálvum. Hetta skal fyriskipast soleiðis, at studentafeløgini á hvørjum ári fáa eitt ávíst tal av mánaðarligum útbúgvingarstuðulsgjaldum at ráða yvir, sum tey sjálvi býta, men sum vera útgoldin gjøgnum Stuðulsstovnin. Tað skal tó ikki vera møguligt at fáa stuðulsgjald frá Stuðulsstovninum og studentafeløgunum samstundis.

Fastur kærurættur

MFS og LFÚ eiga at hava rætt til at kæra allar fyrisitingarligar avgerðir, sum verða tiknar eftir lógini um útbúgvingarstuðul. Kærur frá MFS og LFÚ verða viðgjordar av Undirvisingar- og Mentamálastýrinum. Hetta eigur at verða skrivað inn í lógina, t.d. sum § 9, stk. 3.

Málið um heimildarleysu broytingina av umsóknarfreistini til ferðaískoyti 1996/97 til lesandi uttanlands hevur vist á tørvin á at hava henda fasta kærurætt.

Álitið um nýggja útbúgvingarstuðulsskipan, viðmerkingar til einstøku broytingarnar

Arbeiðsbólkurin, sum landsstýrismaðurin í undirvísingarmálum setti at endurskoða ÚS-stuðulsskipanina hevur tilmæli um broytingar av verandi útbúgvingarstuðulsskipan. Nevndarsetningurin áleggur arbeiðsbólkinum at koma við "tilmæli um eina hóskandi stuðulsskipan". Í álitinum sigur arbeiðsbólkurin, at "verandi lóg um útbúgvingarstuðul hevur munandi brek".

Niðanfyri verða gjørdar viðmerkingar til álitið hjá arbeiðsbólkinum sum hevur endurskoðað útbúgvingarstuðulsskipanina. Hesar viðmerkingar eru gjørdar í somu rað, sum viðurskiftini verða umrødd í álitinum.

Tal av lesandi		Ungdómsútbúgving	Hægri útbúgving
Undir 18 ár	Heimabúgvandi	236	2
	Útibúgvandi	90	3
Yvir 18 ár	Heimabúgvandi	* 615	* 70
	Útibúgvandi	565	438
Ialt		1506	513

** Fyri tey heimabúgvandi yvir 18 ár er býtið millum ungdómsútbúgvingar og hægri útbúgvingar mett. ti Føroya Sjómansskúli og Klaksvíkar Sjómansskúli eru ikki útgreinaðir í flokkar.*

Árligi kostnaðurin av hesum er kr. 48.548.880, men harumframt koma kr. 1.000 í bókaískoyti til 1506 lesandi kr. 1.506.000 og ferðaískoyti kr. 1.320.000 (sama sum arbeiðsbólkurin), so samlaði kostnaðurin av uppskoti MFS og LFÚ til útbúgvingarstuðulsskipan er **kr. 51.374.880 kr**, sum er innanfyri valda figgjarkarmin, sum vit hava frá álitinum hjá arbeiðsbólkinum.

MFS og LFÚ mæla til somu láninøguleikar sum arbeiðsbólkurin, so uppskot okkara hevur ikki ávirkan á figgingarkrøvini í mun til uppskotið hjá arbeiðsbólkinum.

Orð at enda

MFS og LFÚ mæla til at seta uppskotið frá feløgunum i verk heldur enn uppskotið hjá arbeiðsbólkinum, sum hevur latið landsstýrismanninum álitið um nýggja útbúgvingarstuðulsskipan.

MFS og LFÚ vilja ikki siga at okkara uppskot til útbúgvingarstuðulsskipan ger munin á "verandi lóg um útbúgvingarstuðul hevur munandi brek" og "tilmæli um eina hóskandi stuðulsskipan". Men tað meta vit heldur ikki uppskotið frá arbeiðsbólkinum ger. MFS og LFÚ vilja kortini kalla uppskotið hjá feløgunum eitt meira rættvíst og solidariskt býtið innanfyri figgjarkarmar til útbúgvingarstuðul, sum arbeiðsbólkurin hevur sett. MFS og LFÚ meta eisini hetta uppskot geva fleiri møguleika at taka eina útbúgving enn uppskotið hjá arbeiðsbólkinum.

Endamálsorðingin

MFS og LFÚ taka undir við, at endamálið við útbugvingarstuðulsskipanini kemur inn í lógina. Feløgini taka eisini undir við teirri orðing sum arbeiðsbólkurin skjýtur upp í álitinum, men meta ikki at orðingin í sjálvum lógaruppskotinum svarar til hesa orðing.

Feløgini tulka endamálsorðingina soleiðis: Javnbjóðis møguleikar at taka eina útbúgving eru, tá sjálv útbúgvingarstuðulsskipanin ikki hevur ávirkan á lestrarmynstrið í Føroyum.

Feløgini ynskja eina orðing sum umfatar orðið "javnbjóðis" í §1 í lógini.

Upphæddirnar

MFS og LFÚ taka undir við, at stuðulsupphæddirnar eiga at hækka. Feløgini halda tó ikki, at tey, sum eru yvir 18 ár eru serliga illa fyri. Heldur eru tað tey, sum hava hava egnan bústað, ið hava serligan tørv á øktum útbúgvingarstuðli.

Aldursmarkið

MFS og LFÚ taka ikki undir við at hækka aldursmarkið fyri at fáa útbúgvingarstuðul til 18 ár. Verður aldursmarkið hækka, verður møguleikin at taka eina útbúgving tikin frá nøkrum lesandi. Ung undir 18 ár sum hava hug at byrja eina ungdómsútbúgving kunnu koma í ta støðu, at tey noyðast at bíða til tey kunnu fáa útbúgvingarstuðul. Sostatt vil hækking av aldursmarkinum avlaga lestrarmynstrið í Føroyum, og stríður hetta ímóti endamálinum við útbúgvingarstuðulsskipanini.

MFS og LFÚ taka ikki undir við, at forsyrgjaraskyldan hjá foreldrunum skal brúkast sum prógvgrund fyri at taka útbúgvingarstuðulin frá teimum, sum eru undir 18 ár, tí aldursmark viðvíkjandi forsyrgjaraskylduni er einans eitt løgfrøðiligt fyribrigdi, sum ikki er úr føroyskari síðvenju og mentan.

Ferðaútreiðslur

MFS og LFÚ taka undir við at ferðaútreiðslur verða endurgoldnar.

Avbygdanæmingar

MFS og LFÚ taka undir við at næmingar undir 18 ár fáa iskoyti til leiguútreiðslur. Uppskotið hjá MFS og LFÚ til útbúgvingarstuðulsskipan tekur tó hædd fyri hesum, so óneyðugt er at hava eitt serligt iskoyti til leiguútreiðslur á tann hátt, sum arbeiðsbólkurin mælir til.

Iskoyti til undirvísingartilfar

MFS og LFÚ taka undir við at lesandi fáa iskoytisstuðul til keyp av undirvísingartilfari. Í útbúgvingarstuðulsskipanini, sum feløgini skjóta upp, er hesin iskoytisstuðul ikki tengdur at aldrinum. Iskoytisstuðul til keyp av undirvísingartilfari skal hinvegin einans latast lesandi á ungdómsútbúgvingum.

11 mánaðar stuðulsár

MFS og LFÚ meta tað skeivt at lestrarstuðulin verður útgoldin í ellivu gjaldum í staðin fyri tólv.

Lesandi hava útreiðslur alt árið, og fritíðarlon verður ikki roknað av útbúgvingarstuðlinum. Feløgini kunnu tí ikki taka undir við broytingini, sum arbeiðsbólkurin skjýtur upp.

Samanumtikið

Tann útbúgvingarstuðulsskipan, sum MFS og LFÚ mæla til at seta í verk, líkist teirri núverandi í stóran mun. Høvuðsbroytingin er, at munurin í upphæddunum til tey undir og yvir 18 ár verður minkaður, og at

gjørdur verður munur millum upphæddirnar til teirra sum ganga á unglómsútbúgving og á hægri útbúgving í staðin. Harumframt hækka flestu stuðulsupphæddirnar, serliga til tey sum eru útibúgvandi.

Hinvegin líkist uppskotið hjá MFS og LFÚ als ikki uppskotinum í álitinum hjá arbeiðsbólkinum, og ganga broytingarnar hjá MFS og LFÚ og arbeiðsbólkinum hvør sín veg. Serliga viðvíkjandi aldrinum ganga tilmælini beint ímóti hvørjum øðrum. Arbeiðsbólkurin mælir til at taka útbúgvingarstuðulin frá teimum sum eru undir 18 ár, meðan MFS og LFÚ mæla til at minka munin millum aldursbólkarnar.

Upphæddirnar og kostnaður

MFS og LFÚ hava mett um fíggjartørvin hjá lesandi, men ásannaðu felagini eins og arbeiðsbólkurin, at innanfyri verandi fíggjarkarmar ber ikki til at nøkta hendan tørv.

Í uppskotinum niðanfyri hava vit tí valt at halda okkum til somu karmar sum arbeiðsbólkurin. Á bls. 21 í álitinum roknar arbeiðsbólkurin seg fram til, at tilmæli teirra kostar kr. 50.664.007. Vit hava eftirroknað hetta tal, men vit meta, at ein villa er í útrokningunum. Henda villa stavar frá, at arbeiðsbólkurin hevur gloymt at taka hædd fyri, at lesandi í hægri útbúgving sambært teirra uppskoti altíð skulu hava stuðul sum útibúgvandi. Sambært tølunum í fylgiskjali nr. 6.2 í álitinum er talan um í minsta lagi 60 men helst o.u. 70 lesandi, sum skulu hava kr. 11.000 meira árligt, enn arbeiðsbólkurin hevur roknað við, og kostar hetta tí o.u. kr. 770.000 meira. Henda útreiðsluparm, kr. 51.434.000 hava vit tí valt at rokna eftir.

Upphæddir sum MFS og LFÚ meta sum hóskandi, skulu vit halda okkum innanfyri útreiðslukarmin eru settar í talvuna niðanfyri. Tølini eru roknaði sum mánaðarlig gjøld, tí útbúgvingarstuðulin verður útgoldin í 12 gjøldum. Ískoyti til undirvísingartilfar er tó árligt gjald.

Grundupphædd	kr. 915
Lestrarlán	kr. 2000
Ískoyti til húsaleigu	kr. 915
Ískoyti til egið húsarhald	kr. 545
Aldursískoyti	kr. 275
Ískoyti við hægri útbúgving	kr. 360
Ískoyti til undirvísingartilfar	kr. 1000
Ískoyti til ferðing	kostnaðin við bygdaleiðum

Sostatt gerast árligu útbúgvingarstuðulsupphæddirnar hesar:

Árligar stuðulsupphæddir		Unglómsútbúgving	Hægri útbúgving
Undir 18 ár	Heimabúgvandi	kr. 10.980	kr. 15.300
	Útibúgvandi	kr. 21.960	kr. 26.280
Yvir 18 ár	Heimabúgvandi	kr. 14.280	kr. 18.600
	Útibúgvandi	kr. 31.800	kr. 36.120

Tal á lesandi í ymsu bólkunum er sum arbeiðsbólkurin brúkar í sínum útrokningum á bls. 21 í álitinum og sambært talvu sum er ein dagføring av teirri í fylgiskjali nr. 6.2, og sum Páll Isholm hevur útflýggjað feløgunum. Sí talvu niðanfyri.

STUDIESTÖDET I DE NORDISKA LÄNDERNA

Ilpo Lahtinen
FPA Finland

EGEN VALUTA

1. STUDIESTÖDETS BELOPP

HÖGSKOLESTUDERANDE PÅ HÖSTEN 1996 (SEK)

		Hos föräldrarna	*Ensamstående studerande*	
		kr/mån	*kr/mån*	*kr/år*
Danmark	*bidrag*	1 792	3 551	42 612
	lån	1 846	1 846	22 152
1,00	*Sammanlagt*	3 638	5 397	64 764
Finland	*bidrag*	750	2 394	28 728
	lån	1 300	1 300	15 600
1,00	*Sammanlagt*	2 050	3 694	44 328
Island	*bidrag*	0	0	0
	lån	38 220	54 600	491 400
1,00	*Sammanlagt*	38 220	54 600	491 400
Norge	*bidrag*	0	1 595	15 950
	lån	4 120	4 545	45 450
1,00	*Sammanlagt*	4 120	6 140	61 400
Sverige	*bidrag*	1 963	1 963	17 667
	lån	5 096	5 096	45 864
1,00	*Sammanlagt*	7 059	7 059	63 531

Tillägg som ingår
Skattepliktig inkomst
Evt. undervisningsavgift
max. (per månad): 1 407

Bostadstillägg för ensamst: 854
Studiepenning skattepliktig inkomst
Gäller för studerande som fyllt 20 år

Bostads-
och
studiematerialtillägg

Bidragets andel av studiestödet

	%	%
Danmark	49,3	65,8
Finland	36,6	64,8
Island	0,0	0,0
Norge	0,0	26,0
Sverige	27,8	27,8

Tillägg som inte ingår i tabellen:

Danmark: Terminsavgifter 1 407 kr/mån som bidrag

Finland: Skötseln av gamla studielån med räntestöd (Lånebeloppet x 4,25 % / 12, som lån)
Studerande utan familj, som är under 20 år eller bor hos sina föräldrar, kan få förhöjd studiepenning (10-100 %), om föräldrarnas beskattningsbara inkomst är högst 155 000 kr/år. Deras studiepenning är 230 1 500 kr/mån (min-max).

Island: Försörjartillägg 25 % för varje barn, 45 % för ensamförsörjare, 50 % för make i vissa fall. Tillägg för böcker, resor, terminsavgifter, barnbidrag och ränteutgifter.

Norge: Försörjartillägg 1 110 kr/mån/barn som bidrag (48,5 %) och lån.
om maken/makan studerar. 2 225 kr/mån, om maken/makan inte studerar.
Reseersättning (som bidrag)
O. dyl.

Sverige: T.ex. för dubbel bosättning 2 027 kr/mån som lån
Resekostnader, musikinstrument och terminsavgifter (som lån)
Bostadstillägg kan sökas hos kommunerna. Studerande som inte fyllt 29 år kan ha rätt till bostadstillägg om hyran är över 1 800 kr/mån.

TID FÖR VILKEN STÖD KAN BEVILJAS

Danmark Studiestödet beviljas för den hela fastställda studietiden med en ansökan. Stödet inbetalas 12 månader per år till och med under sjukdomen och graviditeten. Om studeranden avlagt examen snabbare än normalt, kan han få dubbelstöd eller använda de besparade stödmånader i fortsätta studier.

Finland Stöd beviljas för månader under vilka studeranden studerar regelbundet (t.o.m. 12 mån/år). Man kan få studiestöd för högst 70 månader. För avläggande av en grundexamen är maximitiden 55 månader. Oförbrukade stödmånader kan användas för andra högskolestudier. Om den studerande fått studiestöd för sina nuvarande högskolestudier under studieåret 1991-92 eller tidigare, är maximitiden sju år.

Island Stödet beviljas vanligen för nio månader- längre, om sommarterminen. Maximitiden är fem år, men när det gäller fortsätta vetenskapliga studier, maximitiden är 10 år tidigare stödåren medräknat.

Norge Stödet beviljas vanligen för 10 månader. Till utbildning vid högskolor och universitet kan stödet beviljas i åtta år. I fall studeranden har insjuknats, kan han få låneandelet som bidrag under högst tre månader. En del av studielånet kan annuleras pga långvariga studier, som fullgjorts på normerad tid. Kvinnlig studerande, som får barn, kan få hela stödet som bidrag till och med i 42 veckor.

Sverige Stödet beviljas för nio månader dock högst i sex år. Undantag kan göras.

2. BEHOVSPRÖVNING

Egna inkomster	*Fribelopper*				
Danmark	53 056	kr/år	förhöjt med	16 571	kr/år/barn. (Gäller, om man studerar hela året.)
Finland	1 800	kr/mån		Bara stödmånadet	
Island	180 000	kr/år	140 000	för hemmaboende, högre om försörjare	
Norge	3 150	kr/mån		Bara stödmånader	
Sverige	30 770	kr/kalenderhalvår			

Eget förmögenhet	*Fribelopper*		
Danmark	nej		
Finland	nej		
Island	nej		
Norge	151 000	kr	
Sverige	nej		

Makans/ens inkomster	*Fribelopper*			
Danmark	nej			
Finland	nej			
Island	655 200	kr/år	högre om försörjare	
Norge	nej		11 120	kr/mån för försörjartillägg
Sverige	nej			

Makans/ens förmögenhet	*Fribelopper*		
Danmark	nej		
Finland	nej		
Island	nej		
Norge	290 000	kr	Familjens sammanlagda förmögenhet
Sverige	nej		

Föräldrarnas ekonomisk ställning		*Inkomstgränsen är*		
Danmark	18-19 -åringar	197 081	344 385	kr/år (max - min; gäller bara tillägg)
Finland	nej	Studiepenningen kan i vissa fall förhöjas p.g.a.		
Island	nej			
Norge	-18 år (-19 år i annat än högskolor)	147 000	kr/år	
Sverige	nej			

3. STUDIELÅNET

Räntan under studietiden

Danmark	4,0	%	kapitaliseras
Finland	Banken och studeranden kommer överens (c:a 5-7 %), kapitaliseras under studiestöds-tiden. För de gamla studielån med räntestöd gäller samma villkor som hittills (räntan 4,25 / 7 %).		
Island	0,0	%	indexreglerat
Norge	0,0	%	
Sverige	6,25	%	kapitaliseras

Räntan därefter

Danmark	3,25	%	kapitaliseras	Varierar (diskonton + tillägg).
Finland	Banken och studeranden kommer överens.			
Island	1,0	%	max. 3 %	+ indexreglerat
Norge	6,0	%	kapitaliseras; efter 7 år 6,5 %	
Sverige	6,25	%	kapitaliseras	

Återbetalningen börjar

Danmark	1 år efter utgången av året då studierna avslutats
Finland	Banken och studeranden kommer överens.
Island	2 år efter studierna avslutats
Norge	10 månader efter studierna avslutats
Sverige	Vid det årsskifte som följer minst sex månader efter studier med studiestöd avslutats

Återbetalningstiden

Danmark	7-15 år (avhängande av lånets storlek)
Finland	Banken och studeranden kommer överens.
Island	ej fastställt (beror på lånet och lånets storlek)
Norge	max. 20 år (i undantagsfall 30 år)
Sverige	Kan variera, men högst fortgå tills man fyllt 65 år

Återbetalningsregler

Danmark	Betalas med lika stora belopp var annan månad (minst	200	kr).	
	Beloppet används för 1) löpande räntor, 2) räntor som förfallit under studie-tiden och betalningspausen och därefter 3) avdrag.			
Finland	De gamla studielånen med räntestöd: Räntestödet upphör 1,5-2 år och återbetalningen börjar 2-2,5 år efter studierna avslutats. Återbetalningstiden är två gånger den tid man tyft studielån, dock högst 14 år. Exempel: studieskuld			
	70 000 kr, återbetalningstid 14 år, annuitet är	644	kr/mån.	
	De nya studielånen: Om räntan är 6 %, lånar 54 gånger månadslånet med			
	1 000 kr. Efter sex års studietid lånekapitalet är	65 384	kr.	
	Återbetalningstiden är 12 år och avgiften	635	kr/mån.	
Island	Första fem år: 5 % av inkomster - därefter: 7 %			
	Minimibeloppet: 51 932 kr/år + utgifter (indexreglerat)			
Norge	1) 10 mån betalningspaus efter studier.			
	Därefter annuitetsprincip kvartalsvis.			
	T.ex. Lån på 150 000 kr -> avgifter . 253 500 kr)			
	2) Om man ansöker om INTB-ordning, amortering högst 6 % av brutto-inkomster (enligt beskattningen). INTB kan användas i max. 7 år.			
	Lånet skall vara inbetalt före man fyllt 65 år.			
Sverige	Den årliga avgiften är 4 procent av den sammanräknade inkomsten två år tidigare.			

124 Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um áseting av skatti til landskassan

Ár 1998, hósdagin 5. mars, legdi Anfinn Kallsberg, landsstýrismaður, vegna landsstýrið fram soljóðandi

Uppskot
til
løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um áseting av skatti til landskassan

§ 1.

Í løgtingslóg nr. 87 frá 1. september 1983 um áseting av skatti til landskassan við seinni broytingum verða gjørdar hesar broytingar:

1) Í § 2, stk. 1, 1. pkt. verður "2.900 kr." broytt til: "4.000 kr.".
2) Í § 2, stk. 2 verður 4. pkt. strikað.
3) Í § 3 verður stk. 4 strikað.

§ 2.

Henda lóg kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd, tó so, at § 1, nr. 1 kemur í gildi 1. januar 1998 og § 1 nr. 2 og nr. 3 kemur í gildi 1. januar 1999.

Viðmerkingar

Í uppskotinum til broytingar í løgtingslóg um áseting av skatti eru tríggjar broytingar.

Fyrsta broytingin, sum er sett fram, er við atliti til at betra um korini hjá barnafamiljum. Í samsvar við ásetingarnar í samgonguskjalinum hjá sitandi samgongu verður skotið upp at hækka barnafrádráttin í landsskattinum við kr. 1.100 pr. barn, úr kr. 2.900 til kr. 4.000. Fíggjarligu meirútreiðslurnar eru mettar til at verða umleið kr. 11 mio. Fyrisitingarliga fer broytingin ikki at hava nakrar trupulleikar ella aðrar meirútreiðslur við sær.

Hini broytingarnar eru tillagingar til umleggingina og einfaldanina av skattaskipanini og sjálvuppgávuni, sum áhaldandi hevur verið arbeitt við tey seinastu árini.

Næsta broytingin er ein tillaging av ásetingarlógini til nýggju reglurnar um hjúnabandsskatt og sjálvuppgávu, sum kom í gildi 1. januar 1998. Broytingaruppskotið hevur við sær, at ein óbýttur barnafrádráttur hjá hjúnafelaga framyvir vil verða útgoldin sum avloysskattur í staðin fyri sum nú at verða fluttur til hjúnafelagan sum negativur skattur, tvs sum ein frádráttur í skattinum. Fyrisitingarliga, og her verður víst til einfaldanina av sjálvuppgávuni, vil broytingin hava eina einfaldan við sær.

Triðja broytingin, sum viðvíkur frádráttinum hjá pensiónistum, er somuleiðis ein tillaging av ásetingarlógini til meginreglurnar og nýggju reglurnar um hjúnabandsskatt og sjálvuppgávu. Endamálið við pensiónistafrádráttinum var at tryggja, at pensiónistar, ið bert fingu grundupphæddina, ikki skuldu rinda skatt. Sum lógin er nú, kann óbýttur frádráttur flytast frá einum pensiónisti til annan. Principielt er samskattan sett úr gildi fyri øll, eisini fyri pensionistar. Vísandi til endamálið annars við pensionistafrádráttinum og nýggju sjálvuppgávuni, verður skotið upp at strika møguleikan til at flyta óbýttan frádrátt til hin hjúnafelagan.

Viðmerkingar til tær einstøku greinirnar

Ad 1) Í samsvar við ásetingarnar í samgonguskjalinum verður skotið upp at hækka barnafrádráttin í landsskattinum við kr. 1.100 kr. pr. barn, úr kr. 2.900 til kr. 4.000 kr.

Ad 2) Við gildi frá 1. januar 1998 eru reglurnar um hjúnabandsskatt broyttar, soleiðis at hjún nú verða sett í skatt hvør í sær. Frá sama degi at rokna vórðu reglurnar um sjálvuppgávu broyttar. Fyri at nikka endamálunum við nevndu broytingum verður skotið upp, at strika møguleikan til at flyta óbýttan frádrátt til hin hjúna-

felagan. Broytingin hevur við sær, at ónýttur frádráttur framyvir verður útgoldin eftir § 2, stk. 3 í ásetingarlógini.

Ad 3) Endamálið við pensiónistafrádráttinum var at tryggja, at pensiónistar, ið bert fingu grunduppheddina, ikki skuldu rinda skatt. Meiningin við ásetingini var soleiðis upprunaliga ikki, at ónýttur frádráttur skuldi flytast frá einum pensiónisti til annan.

1. viðgerð mikudagin 18. mars 1998. Málið verð beint í fíggjarnevndina.

Málið fall burtur sbr. stýrisskipanarlógini § 15 stk. 3, tí at løgtingsval var 30. apríl 1998, og málið ikki var liðugt viðgjørt á tingi fyri valið.

F.L.j.nr. 2540-14/92

125 Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um Toll- og Skattafyrisiting

Ár 1998, hósdagin 5. mars, legði Anfinn Kallsberg, landsstýrismaður, vegna landsstýrið fram soljóðandi

Uppskot
til
løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um Toll- og Skattafyrisiting

§ 1.

Í løgtingslóg nr. 169 frá 30. desember 1997 um Toll- og Skattafyrisiting verður gjørd hendla broyting:

Í § 24, stk. 3 verður 2. pkt. orðað soleiðis:

"Er eftir meting landsskattakærunevndarinnar talan um fullgóð forføll, kann nevndin tó í teimum í stk. 2 nevndu førum taka kæruna til viðgerðar, hóast tær vanligu treytirnar fyri hesum ikki eru uppfyltar."

§ 2.

Henda lóg kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

Viðmerkingar

Hetta uppskot um broyting í lógini um Toll- og Skattafyrisiting er ein nágreining av galdandi reglu.

Uppskotið hevur ikki eykaútreiðslur við sær.

1. viðgerð mikudagin 18. mars 1998. Málið verð beint í fíggjarnevndina

Málið fall burtur sbr. stýrisskipanarlógini § 15 stk. 3, tí at løgtingsval var 30. apríl 1998, og málið ikki var liðugt viðgjørt á tingi fyri valið.

F.L.j.nr. 2520-23/91

126 Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um skattafría samanlegging o.a.

Ár 1998, hósdagin 5. mars, legdi Anfinn Kallsberg, landsstýrismaður, vegna landsstýrið fram soljóðandi

Uppskot
til
løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um skattafría samanlegging o.a.

§ 1.

Í løgtingslóg nr. 171 frá 30. desember 1997 um skattafría samanlegging o.a. verður gjørd hendа broyting:

Í § 1, stk. 1 verður sum 2. pkt. sett:

"Sama ger seg galdandi fyri tryggingarfeløg, ið eru skipað sum sínámillum feløg."

§ 2.

Hendа lóg kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd, og er galdandi frá 1. januar 1998.

Viðmerkingar

Í viðmerkingunum til løgtingslóg nr. 171 frá 30. desember 1997 um skattafría samanlegging o.a. (løgtingsmál nr. 29/1997) stendur, at um tað seinni vísir seg, at brúk er fyri at víðka lógina til at galda fyri tryggingarfeløg, so letur tað seg altíð gera.

Nýggj lóg um tryggingarvirksemi kom í gildi 1. januar 1997, og skiftisreglurnar ásetta, at viðtøkurnar fyri verandi tryggingarfeløg innan 18 mánaðir skulu samsvara við lógina, tvs innan 1. juli 1998.

Við tað at lógin um skattafría samanlegging ikki er galdandi fyri tryggingarfeløg, eru møguleikar teirra skerdir fyri at laga seg til nýggju lógina á ein háttur, sum felagini annars kundu hildið verið tann besta.

Sínámillum tryggingarfeløg gjørdust skattskyldug eftir vanligum skattareglum frá 1. januar í 1996. Tí er eingin grund til, at skattareglurnar skulu avmarka møguleikarnar hjá tryggingarfeløgum fyri samanlegging. Hetta lógaruppskot hevur til endamáls at víðka reglurnar um skattafría samanlegging til eisini at galda fyri sínámillum tryggingarfeløg.

Við atliti til galdandi lóg vil lógarbroytingin verða fíggjarliga neutral fyri landskassan. Broytingin í lógini vil hava við sær, at sínamillum tryggingerfeløg kunnu leggjast saman, uttan skattligar avleiðingar og fram yvir verða gjørd upp og skattaði sum eitt felag. Fyrisitingarliga vil hetta verða tann mest einfalda loysnin. Um lógaruppskotið ikki verður viðtikið og meginreglan í skattalógini skal verða fylgd, hevur hetta tveir møguleikar við sær at velja ímillum:

1. at sínamillum tryggingarfeløg velja burtur frá eina samanlegging. Sínamillum tryggingarfeløg skulu harvið gerast upp og skattast hvørt sær, sum higartil.

2. at sínamillum tryggingarfeløg velja at leggja saman og harvið fylgja meginreglunum í skattalógini og lata ogn og skuld fara inn í nýggja felagið til handilsvirði.

Viðmerkingar til tær einstøku greinirnar

ad § 1. Broytingin ásetir, at sínámillum tryggingarfeløg koma undir lógina um skattafría samanlegging.

1. viðgerð mikudagin 18. mars 1998. Uppskotið hevur í fíggjarnevndini.

31. mars 1998 las formaðurin skriv frá 31 tingmonnum við áheitan um at viðgera uppskotið.
Hósdagin 2. apríl 1998 legdi fíggjarnevndin fram soljóðandi

Á 111

Málið er lagt fram av landsstýrinum 5. mars 1998 og eftir 1. viðgerð 18. mars 1998 beint í figgjarnevndina.

Nevndin hevur viðgjørt málið á fundi tann 1. apríl.

Meirlutin í nevndini, Sune Jacobsen, Eydun Videro, Tordur J. Nielasen og Finnbogi Arge, mælir løgtinginum til at samtykkja uppskotið.
Ein minnihluti, Vilhelm Johannesen, Karl Robert Johansen og Finnbogi Ísakson, setir eingi uppskot fram.

Sama dag var atkvøðugreiðsla um skriv frá 6 tingmonnum um at vikja frá tíðarfreistini millum framlegg av áliti og 2. og 3. viðgerð. Hetta varð samtykt við 15-2-0.

2. viðgerð friggjadagin 3. apríl 1998. §§ 1 og 2 samtyktar 15-5-0. At uppskotið soleiðis samtykt kann fara til 3. viðgerð samtykt 15-5-0.

3. viðgerð leygardagin 4. apríl 1998. Uppskotið, sum samtykt við 2. viðgerð, endaliga samtykt 20-2-0.

Løgtingslóg nr. 45 frá 08.04.1998

F.L.j.nr. 2540-49/97

127 Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um skattligar avskrivingar v.m.

Ár 1998, hósdagin 5. mars, legði Anfinn Kallsberg, landsstýrismaður, vegna landsstýrið fram soljóðandi

Uppskot
til
løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um skattligar avskrivingar v.m.

§ 1.

Í løgtingslóg nr. 52 frá 29. desember 1971 um skattligar avskrivingar v.m., við seinni broytingum verður gjørd hesa broyting:
Í § 3, stk. 1 verður "4.000 kr." broytt til: "10.000 kr."

§ 2.

Henda lóg kemur í gildi dagin eftir, at lógin er kunngjørd, men er galdandi frá 1. januar 1998.

Viðmerkingar

Endamálið við broytingini í løgtingslóg um skattligar avskrivingar v.m. er at dagføra galdandi upphædd fyri útveganarpening fyri rakstrargøgn, sum til fulnar kann verða drigin frá skattskyldugu inntøkuni fyri tað inntøkuár, sum nýútveganin fer fram í.

Núverandi upphædd á 4.000 kr. kom inn í løgtingslógina í 1985. Tí er tað nú neyðugt at fáa dagført hesa upphædd, og verður skotið upp, at útveganarpeningurin upp til 10.000 kr. kann verða drigin frá skattskyldugu inntøkuni tað inntøkuár, sum nýútveganin fer fram í.

Dagføringin av upphæddini, sum kann verða avskrivað alt fyri eitt, vil fyrisitingarligu hava eina lítlan lætta við sær.
Fíggjarliga, fyri landskassan, vil dagføringin av upphæddini hava eina lítla gjaldføris flyting við sær, uttan

at tað tó kann setast nøkur upphæddd á hetta. Her og nú vil tað verða ein lítil missur fyri landskassan, men uppá longri sikt fer broytingin gjaldførisliga at verða útreiðslumeutral.

Landsstýrismaðurin í fíggjarmálum arbeiðir hamnfrumt við, at gera tað møguligt at avskriva restupphæddina uppá rakstrargøgn alt fyri eitt, tá rakstrargøgn er niðurskrivað til eitt ávíst virði.

Viðmerkingar til tær einstøku greinirnar
Talan er um at dagføra galdandi upphæld fyri útveganarpening fyri rakstrargøgn, sum til fulnar kann verða drigin frá skattskyldugu inntøkuni fyri tað inntøkuár, sum nyttveganin fer fram í.

1. viðgerð miktudagin 18. mars 1998. Uppskotið beint í fíggjarnevndina.

Málið fell burtur sbr. stýrisskipanarlógini § 15 stk. 3, tí at løgtingsvalið var 30. apríl 1998, og málið ikki var lidugt viðgjørt á tingi fyrr valið.

F.L.j.nr. 2540-5/91

128 Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um landsskatt og kommunuskatt

Ár 1998, hósdagin 5. mars, legði Anfinn Kallsberg, landsstýrismaður, vegna landsstýrið fram soljóðandi

Uppskot
til
løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um landsskatt og kommunuskatt

§ 1.

Í løgtingslóg nr. 86 frá 1. september 1983 um landsskatt og kommunuskatt við seinni broytingum verða gjørdar hesar broytingar:

1) § 29, nr. 8 verður orðað soleiðis:
"8) Vinningur av burturluting v.m., smb. løgtingslóg um gjald av vinningi við burturluting v.m."

2) Í § 29 verður sum nýtt nr. sett:
"20) Privata nýtsluvirðið av teldu við útbinaði, sum arbeiðsgevari hevur latið arbeiðstakara at ráða yvir í sambandi við arbeiði.".

3) Aftaná § 29 verður sum nýggj grein sett:
"**§ 29a.** Landsstýrismaðurin í skattamálum kann eftir umsókn loyva at lógu og onnur samsýning, smb. § 1, nr. 1 og 2, vunnin fyri arbeiði, sum Danida skipar fyri og fíggjar, verður fritikin fyri at teljast við sum skattskyldug inntøka, um so er, at arbeiði fyri samsýningina er gjørt í einum menningarlandi, og persónurin er útsendur av Danida.

Stk. 2. Persónur, sum verður útsendur og løntur av fyritøku, ið hevur gjørt avtalu við Danida, er eisini umfataður av stk. 1.

Stk. 3 Landsstýrismaðurin í skattamálum kann í kunngerð áseta nærri reglur fyri skattafrítøku eftir hesi grein, og fyri hvørji skjalprógv o.a. skulu viðleggjast umsóknini."

4) Í § 47, stk. 2 verður aftaná "kommunuskattinum" sett: ", tó í mesta lagi ájavnt við álíknaða kommunuskattin".

5) Í § 76, 2. pkt. verður "31. mars" broytt til: "31. januar".

6) Í § 79, stk. 4 verður í staðin fyri "1. august" aftastaðni sett: "1. oktober".

§ 2.

Henda lóg kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd, tó so, at § 1, nr. 2 og 3 hevur gildi frá 1. januar 1998, og § 1, nr. 5 fær gildi frá 1. januar 1999.

Viðmerkingar

Lóggávan um skatting av vinningum frá spølum hevur verið sera ógreið og beinleiðis misvísandi í einstøkum førum. Ein arbeiðsbólkur varð settur at rudda upp á økinum og gera lóggávuna einklari. Hetta hevur eisini við sær broytingar í skattalógini. Annars verður víst til viðmerkingar í uppskotinum til lóg um gjald av vitaningi við burturbuting v.m.

Nógv starvsfólk ráða í dag yvir teldu, ið arbeiðsgevarin hevur latið teldu, sum kann verða nýtt í arbeiði og privat. Tann í dag nógv nýtta farteldan hevur við sær møguleikan at kombinera arbeiðs- og privatteldum. Hetta hevur við sær størri fleksibilitet í tilrættaleggingini av arbeiðinum; m.a. ber tað í ávísum førum til at verða heima og arbeiða, og møguleika at hava teldu við sær í arbeiðsørindum. Við atliti til galdandi lóg hevur ein ávís óvissa og eftirlitstrupulleiki verið, tá fáir ella ongir eftirlitsmøguleikar hava verið. Sambært galdandi lóg er telda ikki undantikin skattskyldu. Fyri at fáa hesa óvissu burtur á hesum øki og gera lógina í samsvar við veruligu støðu, verður uppskot sett fram um, at privata nýtsluvirðið av teldu við útbúnaði, sum arbeiðsgevari hevur latið arbeiðstakara at ráða yvir í sambandi við arbeiði, ikki telst til tað skattskyldigu inntøkuna, sjálvt um teldan o.a. eisini kann nýtast privat. Hetta hevur ongar fíggjarligar útreiðslur við sær og umsitingarliga vil hetta verða ein lætti.

Við løgtingslóg nr. 16 frá 27. februar 1996 um broyting í løgtingslóg um landsskatt og kommunuskatt, varð tað við § 29 møguleiki fyri at frítaka skattskyldugar persónar fyri skatt, sum forvunnið varð fyri arbeiði, sum Danida skipar fyri og fíggjar. Henda áseting varð tó tíðaravmarkað frá 1. januar 1995 til og við 31. desember 1997.

Endamálið hjá landsstýrinum í 1996 at seta § 29a í løgtingslóg um landsskatt og kommunuskatt í gildi var m.a., at betra um møguleikarnar hjá føroyskum vinnuvirkjum at bjóða uppá arbeiðir, sum Danida felagsskapurin skipar fyri og fíggjar. Ætlanin hjá landsstýrinum var harafturat at skapa sonu skattligar fortreytir hjá teimum persónum, sum vórðu útsendir av føroyskum vinnuvirkjum til Danidaprosjektir, sum fyri teirra donsku starvsfelagar.

Avgjørt var, at lógin skuldi vera tíðaravmarkað fyri tíðarskeiðið 1995-1997 fyri at fáa møguleika at endurskoða skipanina, og meta um neyðugt var at halda áfram eftir hetta tíðarskeið.

Landsstýrismaðurin í fíggjarmálum ynskir við hesum lógaruppskoti at seta § 29a í løgtingslóg um landsskatt og kommunuskatt í lógina aftur.

Arbeiðið, sum teir útsendu hava gjørt í sambandi við Danidaprosjektir, eru á einum høgum fakligum støði. Hetta hevur merkt, at teir, sum hava verið útsendir og harvið eisini teirra virkir, hava fingið eina vitan og nakrar royndir, sum teir annars ikki høvdu fingið. Teir hava við hesum fingið betri møguleikar framyvir fyri at luttaka í kappingum um størri arbeiðsuppgávur í útlandinum, og eisini fáa teir nýtt royndirnar frá útlandinum í samband við arbeiðsuppgávur/prosjektir í Føroyum.

Í tíðarskeiðinum 1995 til 1997 vóru 7 persónar útsendir av føroyskum vinnuvirkjum í samband við Danidaprosjektir, sum komu undir § 29a. Persónarnir, ið útsendir vóru, hava ein serkunnleika á ávísum økjum, og hava hesir verið fult frítiknir fyri at gjalda skatt í 1½ til 6 mánaðir; ein persónur tó í eitt ár. Bruttolønin hjá teimum útsendu hevur verið 25.000 kr. um mánaðin.

Viðmerkjast skal, at ein stórur partur av arbeiðinum í sambandi við Danidaprosjektir fer fram í Føroyum. Inntøkurnar sum koma frá hesum arbeiðinum verða uppgjørdar serskilt, og verða skattaðar, sum vanlig skattskyldug inntøka í Føroyum.

Í mun til løgtingslóg nr. 16 frá 27. februar 1996 verður mælt til, at § 29a ikki verður tíðaravmarkað. Hetta tí, at skipanin hevur víst seg at virka uttan trupulleikar, og harafturat er tað óheppið at gera lutfalsliga stutt-

ar tíðaravmarkingar, tá fleiri av prosjektunum, sum Danida skipar fyri og fíggjar, eru langtíðar prosjektir. Hvørki landsstýrið ella Toll- og Skattstova Føroya hava hatt nakað munandi meirarbeiði av lógarbroytingini. Nærri reglur og mannagongdir, skjalprógv v.m. hava gjørt, at lógin verður umsitin uttan trupulleikar. Endamálið við eftirverandi broytingunum í hesum lógaruppskoti eru fyrst og fremst at gera tað lættari at umsita skattalógina.

Næsta broytingaruppskot er ein tilpassan av lógini um landsskatt og kommunuskatt til nýggju reglurnar um hjúnabandsskatt og sjálvuppgávu, sum kom í gildi 1. januar 1998. Endamálið við pensionistafrádráttinum í § 3 í løgtingslóg um áseting av skatti var at tryggja, at pensionistar, ið bert fingu grunduppheddina, ikki skuldi rinda skatt. Principielt er samskattan sett úr gildi fyri øll, eisini fyri pensionistar, og ónýttur frádráttur eigur sambæn galdandi lóg ikki at kunna flytast frá einum pensionisti til annan. Vísandi til endamálið annars við pensionistafrádráttinum, nýggju sjálvuppgávuna og framlagda uppskot til broyting í løgtingslóg um áseting av skatti til landskassan verður tí skotið upp, at strika møguleikan fyri at flyta ónýttan frádrátt í kommunuskattin til hin hjúnafelagan. Henda broyting hevur ikki fyrisitingarligar ella fíggjarligar avleiðingar við sær.

Uppskotið til broytingar í løgtingslóg um landsskatt og kommunuskatt eru einans broytingar, hvørs endamál eru at gera umstøðurnar betri hjá Toll- og Skattstovu Føroya í sambandi við skattauppgerðina. Hesar broytingar hava ikki fíggjarligar avleiðingar við sær.

Viðmerkingar til tær einstøku broytingarnar

Ad 1:

Henda broyting verður framd, eftirsom tað bert skulu vera vinningar, ið lata avgjald eftir lógum um gjald av vinningi við burturluting v.m., sum eru undantiknir landsskatt og kommunuskatt.

Ad 2:

Eftir uppskotinum skal privata nytsluvirðið av teldu við útbúnaði, sum arbeiðsgevari hevur latið arbeiðstakara at ráða yvir í sambandi við arbeiði, ikki teljast til tann skattskyldigu inntøkuna, sjálvt um teldan o.a. eisini kann nytast privat.

Sum útbúnaður er í hesum sambandi at skilja: software, scannari, modem o.a., meðan haraftur ímóti t.d. telefonsamband, ið kann nytast til datatransmissión, verður viðgjørt eftir reglunum um fría telefon.

Ad 3:

ad stk 1. Skattafrítøkan (objektiva) er bert tengd at persónum undir fullari skattskyldu í Føroyum, sum gera arbeiði í menningarlondunum.

Skattafrítøkan fevnir bert um inntøku, sum ein persónur hevur vunnið fyri arbeiði, sum Danida skipar fyri og fíggjar, og tá arbeiðið er gjørt í einum menningarlandi. Orsøkin til at velja einans Danidaarbeiðir er, at Danida virkar sum ein vælskipaður altjóða felagsskapur innan fyri menningararbeiði.

Talan skal vera um at útsenda persónar, sum hava eina ella nóra servitan á einum øki. Persónarnir skulu tí lúka tey krøv, sum Danida vanliga stillar fyri at kunna gjøgnumføra eitt projekt.

ad stk 2. Lógaruppskotið umfatar bæði persónar, sum gera beinleiðis sáttmála við Danida og persónar, sum verða útsendir, og har eitt felag ella annað felag, hevur gjørt sáttmála við Danida. Her verður hugsað um entrepriseviðurskifti og undirentrepriseviðurskifti.

Tann føroyska fyrítøkan kann ikki verða fritikin fyri at gjalda skatt av sáttmálauppheddini frá Danida. Fítøkini skulu haldast fyri seg í rokniskapinum.

ad stk. 3. Fútøkun kann veitast eftir umsókn til landsstýrið. Fyri at allar umsóknir skulu fáa eina ensháttaða og fullfíggjaða viðger, verður landsstýrismanninum í skattamálum heimilað í kunngerð at áseta nærri reglur fyri, hvussu hesi mál skulu umsitast.

Ad 4:
Endamálið við pensiónistafrádráttinum var at tryggja, at pensiónistar, ið bert fingu grunduppheldsins, ikki skuldu rinda skatt. Meiningin við ásetingini var soleiðis upprunaliga ikki, at ónýttur frádráttur skuldi flytast frá einum pensiónisti til annan.

Vísandi til endamálið við reglunum, og annars nýggju reglurnar um hjúnabandsskatt og sjálvuppgávu, verður skotið upp, at strika møguleikan til at flyta ónýttan frádrátt til hin hjúnafelagan.

Ad 5:
Galdandi freist til 31. mars ger, at Toll- og Skattstovan í prinsippinum skal bíða til aftaná 31. mars við at skriva skattauppgerðina út, um uppgerðin skal vera eftirfarandi. Skotið verður tí við hesum uppskoti upp, at freistin verður sett til 31. januar, soleiðis at eftirfarandi skattauppgerðir kunnu sendast út longu í februar mánaði.

Ad 6:
Seinasta freist fyri at lata inn sjálvuppgávu er 15. august, og uppgerðin kann tí í fyrsta lagi gerast fyrst í september. Skotið verður tí upp, at 1. august verður broyttur til 1. oktober.

1. viðgerð týsdagin 17. mars 1998. Uppskotið vavð beint í fíggjarnevndina.

Málið fall burtur sbr. stýrisskipanarlógini § 15 stk. 3, tí at løgtingsval var 30. apríl 1998, og málið ikki var liðugt viðgjørt á tingi fyri valið.

F.L.j.nr. 2540-5/91

129 Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um stuðul til rentuútreiðslur

Ár 1998, hósdagin 5. mars, legði Anfinn Kallsberg, landsstýrismaður, vegna landsstýrið fram soljóðandi

Uppskot
til
løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um stuðul til rentuútreiðslur

§ 1.

§ 1. Í løgtingslóg nr. 148 frá 30. desember 1996 um stuðul til rentuútreiðslur verða gjørdar hesar broytingar:

1) Í § 1, stk. 2, 1. pkt. verður "og nr. 2" strikað.
2) Í § 2 verður sum nýtt stk. sett:
   "*Stk. 2.* Við egnan bústað er at skilja skattligi bústaðurin."
3) Eftir § 2, stk. 2 verður sum nýtt stk. sett:
   "*Stk. 3.* Verða eini hús nýtt til bæði bústað og annað endamál, verða samlaðu rentuútreiðslurnar viðgjørdar eftir hesi lóg og ikki eftir skattalógini.".
4) Eftir § 2 verður sum nýggj grein sett:
   "**§ 2a.** Tað er eitt treyt fyri at fáa stuðul eftir hesi lóg, at lánið sum heild er stuðulsloyvt. Lán, sum lutvíst eru fiarin til eitt ella fleiri av teimum í § 2 nevndu endamálunum, lutvíst til onnur endamál, skulu fyri at koma undir hesa lóg fyrst uppbýtast.
5) Í § 7, stk. 1 verður eftir "umsókn" sett: ", og verð-

ur stuðul, um neytinar annars eru loknar, veitur fyri tilskrivaðar rentur frá hesum degi at rokna, smb. tó § 4, stk. 2.".

§ 2.

Henda lóg kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd, tó so, at § 1, nr. 3 kemur í gildi 1. januar 1999.

Almennar viðmerkingar

Tá lógin um stuðul fyri rentuútreiðslur varð sett í gildi í fjør, var meiningin at skipanin skuldi geva sonnu møguleikar fyri stuðuli, sum áður vóru galdandi fyri rentufrádráttin. Umsitingarliga er komið fram, við við gerð av teim einkultu umsóknunum um rentustuðul, at neyðugt er á ávísum økjum at gera eina nágreining av verandi lóg. Nágreiningin av lógini tryggjar, at hon verður so eintýdug og einkul sum møguligt, og samstundis eisini tryggjar, at bert tey sum hava rætt til rentustuðul í veruleikanum fáa stuðul.

Henda nágreining av lógini ger, at umsitingin av henni verður minni krevjandi og, at fleiri avmarkingar verða í rættinum til rentustuðul. Hesar broytingar vilja alt annað líka gera lógina bilgari, utlan at tal kann setast á. Tó viðførir §2, stk. 3, sum snýr seg um hús við privatari og vinnuligari nytslu, at rentustuðulsútgjaldingarnar økjast líka nógv, sum skattainntøkurnar økjast av, at rentufrádráttarin í skattskyldugum leiguinntøkum fellur burtur. Fyri landskassan er §2, stk. 3 sostatt útreiðslumeutral.

Viðmerkingar til tær einstøku broytingarnar

Ad 1) Mælt verður til at strika "og nr. 2" í § 1, stk. 2, 1. pkt., sum helst ikki hevur praktiskan týdning, um § 1, stk. 2 verður borin saman við § 8.

Ad 2) Sambært § 2, stk. 2 verður við "ognum bústað" at skilja skattligi bústaðurin, t.v.s. miðdepilin fyri lívsáhugamálum umsøkjarans (húsini í domicilliandinum).

Av praktiskum orsøkum verður stuðul, í sambandi við keyp av grundstykki ella húsi, veittur frá undirskrivan av keypseðli ella skeyti at rokna, og ikki frá tí degi at rokna, tá ið flutt verður inn í húsini. Talan er um eina meginreglu, sum einans verður nýtt, um umsøkjarin ikki frammanundan longu eigur "egnan bústað" - grundstykki ella hús. Í síðstnevnda fóri verður kravt, at nýggju húsini eru bygd, og at umsøkjarin er fluttur inn í hesi, áðrenn stuðul verður veittur. Frá sama degi at rokna steðgar stuðulin fyri gomlu lánini, tó ikki, um hesi lán koma undir § 2, stk. 1, nr. 1.

Omanfyri nevnda hevur við sær, at byggirentur uppá nýggja lánið ikki verða stuðlaðar, hvørki í sambandi við rentutilskrivingina ella seinni, um viðkomandi í hesum tíðarskeiði hevur annan "egnan bústað".

Ad 3) Í § 2, stk. 3 verður ásett, at um eitt hús verða nýtt til bæði bústað og annað endamál, verða samlaðu rentuútreiðslurnar viðgjørdar eftir hesi lóg. Broytingin nevnir við sær, at samlaðu rentuútreiðslurnar av lánum til hús við dupultum endamáli, t.v.s. hús sum lutvíst verða nýtt til bústað hjá eigaranum og lutvíst verða útleigaði ella nýtt til annað vinnuligt virksemi, verða viðgjørdar eftir rentustuðulslógini. Staðfest verður soleiðis við hesi broyting, at rentuútreiðslurnar - eisini lutin parturin, sum viðvíkur tí síðstnevnda - verða viðgjørdar eftir rentustuðulslógini, og ikki sum frádráttur eftir skattalógini.

Eftir galdandi lóggávu kunnu rentur av lánum til bygningar, ið lutvíst verða nýttir til bústað, lutvíst til vinnu, verða drignar frá sum rakstrarútreiðsla eftir skattalógini, hvat síðstnevnda partinum viðvíkur. Hvat fyrstnevnda partinum viðvíkur verða reglurnar í rentustuðulslógini nyttar.

Við hesi broyting kunnu vinnuligu renturnar til hús við dupultum endamáli ikki dragast frá eftir skattalógini yvirhevur. Hetta hevur við sær, at eisini vinnuligi parturin av rentuútreiðslunum verður fyri teimum avmarkingum, ið rentustuðulslógin ásetir, t.d. í §§ 3 og 5.

Fyri at geva møguleika fyri at umhugsa møguliga frálíkan ella frámatrikulering (sundurbýti), verður mælt til, at hendan broyting ikki verður sett í gildi fyrr enn 1. januar 1999. Áðrenn skipanin er komin í gildi verð-

ur sostan loyvt, at rentumar verða býttar eftir flatalutfallinum millum privata íbúðarpartin og vinnuliga part in av bygningunum, t.v.s. at privati parturin verður viðgjørdur eftir rentustuðulslógini, meðan vinnuligi parturin verður viðgjørdur eftir skattalógini.

Ad 4) Reglan verður skotin upp, fyri at lætta um eftirlitsuppgávuna hjá Toll- og Skattstovu Føroya.

Ad 5) Fyri at gera stuðulsskipanina lættari at umsita, verður skotið upp, at broytu ásetingina soleiðis, at rentustuðul ikki verður veittur aftanvirkandi. Ásetingin er tó ikki galdandi fyri samansavnaðar rentur eftir § 4, stk. 2, har stuðul ikki verður veittur fyrr enn afturgjalding er byrjað.

Í samband við umsókn um framhaldandi stuðul verður ásetingin einans at nýta, um krevd skjalprógv ikki verða innsend innan ein mánaða eftir at umsøkjarin hevur móttikið hesi.

1. viðgerð mikudagin 18. mars 1998. Uppskotið beint í fíggjarnevndina.

Málið fall burtur sbr. stýrisskipanarlógini § 15 stk. 3, tí at løgtingsval var 30. apríl 1998, og málið ikki var liðugt viðgjørt á tingi fyri valið.

F.L. j.nr. 2540-37/97

130 Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um toll

Ár 1998, hósdagin 5. mars, legði Anfinn Kallsberg, landsstýrismaður vegna landsstýrið frum soljóðandi

Uppskot
til
løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um toll

§ 1.

Í løgtingslóg nr. 121 frá 23. desember 1991 um toll við seinni broytingum verður gjørd hendа broyting:
Í § 14 verður stk. 3 orðað soleiðis:
"*Stk. 3.* Sum vinnuligur innflutningur er at skilja innflutningur við vinnuligum endamáli.".

§ 2.

Henda lóg kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

Viðmerkingar

Hetta uppskot til broyting í tolllógini sum her verður lagt fyri tingið, er ein nágreining av lógini, soleiðis at vinnuligt kontra privat kemur klárari fram.

Tað, ið sermerkir vinnuligan aktivitet, er, at tað fyri egnar rokning og ábyrgd verður rikið búskaparligt virksemi við tí endamáli at fáa yvirskot. Vinnuliga endamálið er haraftrat vanliga sermerkt av, at virksemið er nøkulunda reglugigt fjøgnum eitt ávist ikki heilt stutt tíðarbil, haraftrat at vavið av virkseminum gevur møguleika fyri avlopi.

Uppskotið gevur ikki eyka útreiðslur við sær.

1. viðgerð mikudagin 18. mars 1998. Uppskotið beint í fíggjarnevndina.

Málið fall burtur sbr. stýrisskipanarlógini § 15 stk. 3, tí at løgtingsval var 30. apríl 1998, og málið ikki var liðugt viðgjørt á tingi fyri valið.

Fl. j.nr. 2540-39/97

131 Uppskot til løgtingslóg um almanna- og heilsuútbúgvingar

Ár 1998, hósdagin 5. marts, legði Eilif Samuelsen, landsstýrismaður, vegna landsstýrið fram soljóðandi

Uppskot
til
løgtingslóg um almanna- og heilsuútbúgvingar

Kapittul 1
Endamál o.a.

§ 1. Landsstýrismanninum í undirvísingarmálum verður heimilað at skipa fyri stigvíst uppbygdum útbúgvingum á almanna- og heilsuøkinum.

Stk. 2. Útbúgvingarnar sambært stk. 1 eru útbúgving til heilsuhjálpara og útbúgving til heilsurøktara.

Stk. 3. Útbúgvingarnar verða lagdar til rættis soleiðis, at bæði ung og tilkomin hava atgongd.

Stk. 4. Útbúgvingarnar hava hvør sær til endamáls, at næmingarnir eftir lokna útbúgving hava førleika at røkja uppgávur á almanna- og heilsuøkinum, sambanber §§ 6 og 7.

Stk. 5. Útbúgvingarnar verða lagdar til rættis við fyriliti fyri teimum almanna-, heilsu- og starvsfólkapolitisku málunum á teimum starvsøkjum, sum útbúgvingarnar fevna um, og tær skulu lagast til galdandi førleikakrøv. Harumframt skulu útbúgvingarnar geva næmingunum møguleika at nema lestrarførleika við atliti at hægri útbúgving.

§ 2. Útbúgvingarnar verða skipaðar soleiðis, at skift verður millum starvsvenjing á uppfæringarplássum og undirvísing í skúla, og tær enda hvør sær við útbúgvingarskjali.

§ 3. Landsstýrismaðurin ásetur nærri reglur um útbúgvingarnar herundir um krøv, prógtøkuppgevingar, prógtøkur, prógdóming, prógtøl og ummæli fyri hvørja útbúgving sær.

Kapittul 2
Atgongd til útbúgvingarnar

§ 4. Atgongd til útbúgvingina til heilsuhjálpara er treytað av, at umsøkjari

1) í minsta lagi hevur 1 árs starvsligar royndir ella aðra útbúgving eftir loknan fólkaskúla (9. flokk) ella

2) hevur aðrar royndir, svarandi til krøvini í nr. 1.

Stk. 2. Leiðsla skúlans ger av, um krøvini eftir stk. 1 eru rokkin.

§ 5. Atgongd til útbúgvingina til heilsurøktara er treytað av, at umsøkjari

1) hevur útbúgving sum heilsuhjálpari ella

2) í minsta lagi hevur 1 árs viðkomandi førleika grundaðan á annaðhvørt útbúgving ella starvsroyndir ella eina samanseting av hesum báðum ella

3) hevur lokið sjúkrahjálpara-, røktara-, røktarheimsatstøðara- ella ítrivsvegleiðaraút-búgving.

Stk. 2. Leiðsla skúlans ger av, um krøvini eftir stk. 1 eru rokkin.

Kapittul 3
Útbúgvingarskipanin

§ 6. Útbúgvingin til heilsuhjálpara tekur 1 ár og hevur til endamáls at geva førleika at røkja grundleggjandi studuls-, røktar- og umsorganaruppgávur, har brúkarin byr.

Stk. 2. Næmingarnir skulu kunna velja ymiskar lærugreinir móti stytting av starvsvenjingini. Tó kann starvsliga uppfæringartíðin í mesta lagi verða stytt í mánaða.

§ 7. Útbúgvingin til heilsurøktara tekur 1 ár og hevur til endamáls at geva førleika til sjálvstøðugt at røkja og leggja til rættis ítrivs- og umsorganaruppgávur, herundir samskipandi og undirvísingarligt virksemi, og til sjálvstøðugt at røkja grundleggjandi heilsu- og sjúkrarøktaruppgávur á almanna- og heilsuøkinum.

Stk. 2. Næmingarnir skulu kunna velja almennar lærugreinir móti stytting av starvsvenjingini. Tó kann starvsliga upplæringartíðin í mesta lagi verða stytt 1½ mánaða.

§ 8. Landsstýrismaðurin ásetur reglur um upptøku til útbúgvingina og um skúlasamstarv.
Stk. 2. Upptøka av næmingum til útbúgvingarnar sambært hesi lóg skal í størst møguligan mun lagast eftir tørvinum á almanna- og heilsuøkinum.

§ 9. Næmingi, sum hevur tað fyri neyðini, kann verða givin serundirvísing og annar sermámsfrøðiligur stuðul.
Stk. 2. Næmingi verður veitt ráð og vegleiðing viðvíkjandi útbúgvingini og persónligum viðurskiftum.
Stk. 3. Landsstýrismaðurin ásetur gjøllari reglur fyri tey í stk. 1. og stk. 2. nevndu viðurskifti.

§ 10. Landsstýrismaðurin ásetur reglurnar fyri útbúgvingarnar.
Stk. 2. Útbúgvingarreglurnar verða lagdar soleiðis til rættis, at samanhangur er millum starvsligu upplæringina og skúlaundirvísingina.
Stk. 3. Almennar lærugreinir kunnu bjóðast, samanber § 6, stk. 2 og § 7, stk. 2.
Stk. 4. Landsstýrismaðurin ásetur reglur um, at persónar við serligum útbúgvingar- ella starvsligum fyritreytum verða frítiknir fyri partar av útbúgvingunum, samanber § 6, stk. 1 og § 7, stk. 1.
Stk. 5. Landsstýrismaðurin ásetur reglur, ið eru neyðugar fyri at seta í gildi sáttmálar millum Norðurlond.

§ 11. Próvtøkur verða skipaðar eftir reglum, sum landsstýrismaðurin ásetur.
Stk. 2. Reglur um døming og reglur um, hvussu prógvskjøl verða tilevnað og úttlyggjað, verða ásettar av landsstýrissmanninum.

Kapittul 4
Skúlaskipanin o.a.

§ 12. Undirvísingin fer fram í skúla, sum er góðkendur av landsstýrismanninum.

§ 13. Starvsliga upplæringin fer fram á upplæringarplássum, ið eru góðkend av skúlanum og útbúgvingarráðnum í felag.
Stk. 2. Leiðsla skúlans og útbúgvingarráðið hava í felag ábyrgdina av at tryggja tørvin á upplæringarplássum.
Stk. 3. Starvsligu upplæringarplássini hava ábyrgdina av starvsvenjingini, herundir at vegleiða næmingin.

§ 14. Útreiðslurnar av skúlaundirvísingini og av starvsvenjingini verða goldnar úr landskassanum.
Stk. 2. Útbúgvingarráðið skal umsita fíggjarætlan skúlans, áðrenn hon verður send landsstýrismanninum.

§ 15. Útbúgvingin eftir hesi lóg er ókeypis fyri næmingin.
Stk. 2. Landsstýrismaðurin kann ásetta reglur um gjald fyri útreiðslur til undirvísingartilfar.

§ 16. Landsstýrismaðurin ásetur nærri reglur um leiðsluviðurskiftini í útbúgvingunum.
Stk. 2. Leiðsla skúlans selir í starv og loysir úr starvi lærarar og onnur starvsfólk skúlans.
Stk. 3. Landsstýrismaðurin ásetur reglur um førleikakrøvini til leiðslu skúlans og lærararnar.

§ 17. Leiðsla skúlans hevur mótvegis landsstýrismanninum ta dagligu fyrisittingarligu og fíggjarligu leiðsluna av skúlanum um hendi.
Stk. 2. Leiðsla skúlans, smb. § 16, hevur ta fakligu leiðsluna av skúlanum og útbúgvingunum um hendi og hevur ábyrgdina av, at útbúgvingarnar verða framdar samsvarandi teimum reglum, ið ásettar eru við atliti at galdandi førleikakrøvum.

Kapittul 5
Ráðsskipanin

§ 18. Landsstýrismaðurin setur eitt útbúgvingarráð, sum í umsagnum síðum til landsstýrismannin viðger mál um almanna- og heilsuútbúgvingarnar sambært teimum heimildum, tí eru givnar.
Stk. 2. Gjøllari reglur viðvíkjandi útbúgvingarráðnum verða ásettar av landsstýrismanninum.
Stk. 3. Reglurnar sambært stk. 2 skulu greitt lýsa mannagongdina fyri ráðsarbeiðið, heruppií skrivstovuhjálp og útreiðslur til útbúgvingarráðið, tilnevning og val av ráðslimum og um atkvøðugreiðslur.

§ 19. Útbúgvingarráðið hevur 5 limir. Ráðslimirnir verða valdir fyri fyra ár. Fyri hvørm ráðslim verður ein varalimur valdur.
Stk. 2. Landsstýrismaðurin velur formannin.
Stk. 3. Landsstýrismaðurin tilnevnir limir, ið skulu hava fakligt innlit í tey arbeiðsøki, sum lógin um almanna- og heilsuútbúgvingarnar fevnir um.

Stk. 4. Útbúgvingarráðið kann eftir tørvi innkalla serkonna hjálp til at meta á ráðsfundum.

§ 20. Útbúgvingarráðið ger ummæli til landsstýrismanninum:

a) reglur um útbúgvingarnar sum heild og hvørja útbúgving sær, smb. § 3.
b) reglur um upptøku í skúla og um skúlasamstarv, smb. § 4, stk. 2, § 5, stk. 2 og § 8, stk. 1.
c) reglur um serundirvísing og sernámsfrøðiligum studningi, smb. § 9, stk. 3.
d) reglur um ráð og vegleiðing til næmingin viðvíkjandi útbúgvinginni og persón-ligum viðurskiftum, smb. § 9, stk. 3.
e) útbúgvingarreglur við gjøllari ásetingum, smb. § 10, stk. 1.
f) frítøku fyri partar av útbúgvinginí, smb. § 10, stk. 4.
g) reglur um prógvtøku, smb. § 11, stk. 2.
h) reglur um døming og hvussu útbúgvingarskjøl verða tilevnað og útflyggjað, smb. § 11, stk. 3.
i) fíggjaretlan skúlans, smb. § 14, stk. 2.
j) reglur um gjald fyri undirvísingartilfar, smb. § 15, stk. 2.
k) reglur um leiðsluviðurskiftini í útbúgvingunum, smb. § 16, stk. 1.
l) reglur um førleika, smb. § 16, stk. 3.
m) tørvin at endurmyggja reglur og at koma við uppskoti um hetta, smb. § 21, stk. 2.

Stk. 2. Útbúgvingarráðið skal eisini

a) góðkenna og tryggja tørvin á uppfaringar-plássum, smb. § 13, stk. 1 og 2.
b) góðkenna lesiætlanir, smb. § 21, stk. 1.

Stk. 3. Útbúgvingarráðið kann eftir áheitan rádgeva landsstýrismanninum um, hvussu útbúgvingarskipanin eigur at verða løgd til rættis, so at sett mál og krav verða rokkin, og tað kann av sínum eintingum umroða og bera fram alt, ið tað heldur hava týdning fyri útbúgvingarnar.

§ 21. Skúlin skal gera lesi-ætlanir, sum neyvt lýsa innihaldið í undirvísinginí við stoði í teimum reglum, ið sambært § 3 eru ásettar fyri hvørja útbúgving sær. Lesiætlanirnar skulu góðkennast av útbúgvingarráðnum.

Stk. 2. Skúlin og útbúgvingarráðið eiga eisini at fylgja við, um tørvur er á at endurmýggja nevndu reglur og at koma við uppskoti um hetta.

Kapittul 6
Kærurættur

§ 22. Avgerðir, sum leiðsla skúlans tekur við at ætlti at útbúgvingar-, undirvísingar- og prógvtøkuviðurskiftum, kunnu kærast til landsstýrismannin.

Stk. 2. Kæra skal í seinasta lagi 4 vikur eftir at kæraran hevur fingið fráboðan um av gerðina.

Stk. 3. Landsstýrismaðurin kann síggja burtur frá kærufreistini, tá ið serlig viðurskifti gera seg galdandi.

§ 23. Landsstýrismaðurin kann áseta, at heimildin eftir § 22 kann leggjast til eina kærunevnd.

Kapittul 7
Gildissetan

§ 24. Henda lóg fer gildi 1. juli 1998.

Almennar viðmerkingar

Eingin føroysk lóggáva er nakrantíð sett í gildi um almanna- og heilsuútbúgvingar. Tey fólk, sum hava nomið útbúgving á hesum øki, hava verið á skúla í Danmark og har tikið útbúgvingina eftir galdandi donskum útbúgvingarreglum.

Í 1991 settu danir í gildi nýggja lóg um grundleggjandi almanna- og heilsuútbúgvingar. Tað er við stoði í hesi útbúgvingarskipan, at uppskotið um eina føroyska lóg um almanna- og heilsuútbúgvingar er gjørt.

Í teimum yvirskipaðu málsetningunum fyri menningina í almanna- og heilsuverkinum verður tosað um tørvin á breiðum førleika, minking av fakmorkum og ynski um, at almanna- og heilsuútbúgvingarnar eru ein samanhangandi útbúgvingarskipan og harvið liður í tilboðunum um vinnumettaða útbúgving.

Studuls-, roktar- og umsorganarøki fevnir um eitt so stórt útbúgvingar- og arbeiðsøki, at tað verður mett at vera grundlagt fyri eini sjálvstøðugari útbúgvingarskipan á jøvnum fót við aðrar útbúgvingarskipanir.

Lógaruppskotið um heilsuhjálparaútbúgving og heilsuroktaraútbúgving fevnir við sær eina umlegging av útbúgvingunum á studuls, roktar- og umsorganarøkinum, hvørs endamál er at byggja upp samanhangandi útbúgvingar í staðin fyri allar tær núverandi einstøku útbúgvingarnar, sum ikki eru samskipaðar.

Tá ið metast skal um, hvussu nógvir umsøkjarar skulu takast upp til heilsuútbúgvingarnar, kann hetta m.a. gerast við støði í feinum størvum, sum eru á studuls-, røktar- og umsorganarøkinum í heilsuverkinum. Umleið 600 fólk hava útbúgving/skeið á umrøddu øki. Verður roknað við, at starvstíðin er 40 ár. Fara eini 15 fólk úr skipanini hvørt ár. Harafturat kann roknast við, at eins nógv fara úr skipanini á annan hátt (vegna sjúku ella fara í annað starv o.s.fr.), soleiðis at umleið 30 fólk tilsamans fara úr skipanini hvørt ár.

Til tess at nøkta tørvin á heilsuhjálparum í staðin fyri tey, sum fara úr skipanini, skulu 2 flokkar takast upp á hvørjum ári. Roknað er við, at helvtin av teimum, sum hava lokið heilsuhjálparaútbúgvingina fara viðari til heilsurøktaraútbúgvingina, og skal sostatt 1 flokkur takast upp hvørt 1 1/2 ár. Samanlagt vera vanliga sostatt 3 flokkar undir útbúgving um árið. Við tað, at skúlagongdin er 1/3 av samlaðu útbúgvingartíðini, svarar hetta til, at 1 flokkur er í miðal í skúla alt árið. Árligu undirvísingarútreiðslurnar verða mettar at verða umleið kr. 525.000,-.

Mælt verður til bert at taka 1 flokk upp til heilsuhjálparaútbúgvingina hetta fyrsta árið (skúlaárið 1998/99) og somuleiðis bert at taka 1 flokk av umsøkjarum, sum frammundan lúka upptøkukrøvini, upp til heilsurøktaraútbúgvingina. Av hesum verða undirvísingarútreiðslurnar í verandi fíggjarári (1998) mettar til kr. 160.000,-.

Umframt vanligu útbúgvingarskipanina kunnu verandi starvsfólk, sum annaðhvørt hava útbúgving/skeið ella royndir, verða tikin upp til útbúgving eftir einari uppskúlingarskipan. Talan kann verða um eini 300 fólk. Miðal skúlagongdin er roknað til 15 vikur.

Mælt verður til, at fyrsti uppskúlingarflokkur í fyrsta lagi verður tikin upp í januar 1999, m.a. av tí at tað er umráðandi at fáa vanligu útbúgvingina í gongd og í nøkurlunda skipaðar karmar, áðrenn farið verður undir uppskúlingarskipanina.

Í skúlaárinum 1998/99 (t.v.s. í várhálvuni '99) verður 1 flokkur tikin upp til 15 vikurs undirvísing og síðani 1 flokkur hvørt hálvár. Undirvísingarútreiðslurnar um árið umframt aðrar undirvísingar-útreiðslur verða mettar til kr. 400.000,-. Av hesum verða ongar útreiðslur í verandi fíggjarári (1998).

Útreiðslurnar til undirvísingarhøli verða mettar til 350.000 kr. um árið ella kr. 175.000 í verandi fíggjarári.

Samlaðu útreiðslurnar í verandi fíggjarári (1998) verða sostatt kr. 160.000,- + 175.000,- = **kr. 335.000,-**. Harumframt koma umleið kr. 200.000,- til útgerð, og útreiðslurnar til 1/2 starvsfólk, ístandsetan og klárgering verða mettar til kr. 125.000,-.

Tær árligu útreiðslurnar í fíggjarárinum 1999 og framyvir verða kr. 525.000,- + 400.000,- + 350.000,- = kr. **1.275.000,-**.

Av tí at umboð fyri stovnar og felløg hava verið umboðað í nevndini til at gera uppskot um lóg, er uppskotið ikki sent stovnum ella felløgum til umsagnar.

Serligar viðmerkingar

Viðmerkingar til hvørja einstaka grein

Til § 1. Starvsøkið hjá heilsuhjálparum er í høvuðsheitum innan fyribils ella varandi heimahjálp, heimasjúkrarøkt, vardar bústovnar, og sambylir. Starvsøkið hjá heilsurøktararum er í høvuðsheitum á somatiskum og psykiatriskum sjúkrahúsum, røktarheimum og sambylum, hjá likamliga brekaðum og í sambandi við eldrarøktina.

Tær vanligu arbeiðsuppgávur á hesum økjum eru:

- at veita hjálp til vanligt húsligt arbeiði, so sum at keypa inn, matgera og at gera reint o.l.,
- at hjálpa eldri og brekaðum við tí, tey ikki eru før fyri sjálvi, so sum persónligt reinføri,
- at fremja fyribyrgjandi og aktiverandi fysiskar, psykiskar og sosialar uppgávur
- at fremja vanligar og meira fjøltáttaðar sjúkraroktaruppgávur, herundir at eygleiða, at kanntað o.l.
- at venja, hava umsjón, at vegleiða og at undirvísa.

Til § 1, stk. 4. Endamálið við útbúgvingini til heilsuhjálpara er at geva næmingunum fyritreytir fyri at veita brúkarum/familjum arbeiðsligan og persónligan stuðul í tí dagligu; at stuðla, aktivera við tí fyri eyga at kunna varðveita vanligan lívshátt, og at røkja grundleggjandi sjúkraroktarveitingar viðvíkjandi stuðuli, røkt og umsorgan á tí primera almanna- og heilsuøkinum.

Endamálið við útbúgvingini til heilsuroktara er at geva næmingunum fyritreytir fyri at meta um neyðuga tørvin og fyri sjálvsteðugt at røkja og tilrættaleggja samskipaðar umsorganaruppgávur og aktiverandi arbeiði. Hetta fevnir eisini um stimulering af fysiskum, intellektuellum og skapandi eginleikum fyri einstakar borgarar og bólkar av borgarum. Útbúgvingin hevur harumframt til endamáls at geva næmingunum fyritreytir fyri at meta um neyðuga tørvin og fyri sjálvsteðugt at røkja grundleggjandi heilsu- og sjúkraroktarveitingar viðvíkjandi stuðuli, røkt og umsorgan á ti primera og sekundera almanna- og heilsuøkinum.

Til § 1, stk. 5. Útbúgvingin sum heilsuroktari gevur eisini atgongd til aðrar bægri útbúgvingar á almanna- og heilsuøkinum - t.d. útbúgving til sjúkrasystir og ljósmóðir.

Til § 2. Útbúgvingarnar verða skipaðar soleiðis, at skift verður millum starvsvenjing á upplæringarplássum og undirvísing í skúla. Skúlagongdin er umb. 1/3 av útbúgvingartíðini.

Útbúgvingin til heitsuhjálpara fevnir um skúlaundirvísing og starvsvenjing í stuðuli, røkt og umsorgan av fólkum við tørvi á arbeiðsligum og persónligum stuðli, aktivering og grundleggjandi sjúkrarøkt har brúkarin býr.

Útbúgvingin til heilsuroktara fevnir um skúlaundirvísing og starvsvenjing viðvíkjandi umsorgan og aktivering av einstakum borgarum og bólkum av borgarum, serliga eldri og brekaðum. Eisini fevnir heilsuroktara-útbúgvingin um grundleggjandi heilsu- og sjúkrarøkt av sjúklingum og viðskiftafólkum við líkamligum, sálarligum og sosialum tørvi.

Útbúgvingarnar eru skipaðar í eindir (modulum) við skúlaundirvísing og starvsvenjing, ið fevna um ymisk starvsøki, soleiðis at næmingarnir fáa fjølbroyttar royndir á tí primera og sekundera stuðuls-, røktar- og umsorganarøkinum.

Skúlin skal skipa fyri, at starvsvenjingin er í samsvari við ásetingarnar í útbúgvingarskipanini, smb. § 10.

Til § 3. Landsstýrismaðurin ásetir endaligu útbúgvingarreglurnar. Landsstýrimaðurin setir eitt útbúgvingarráð, sum ger og samtykkir reglur fyri hvørja útbúgving sær og letur landsstýrinanninum sítt ummæli.

Til § 4 og § 8. Algongdin til útbúgvingarøkið skal, í so stóran mun sum til ber, grundast á heildarmeting av førleika umsøkjaranna til útbúgving og arbeiði í viðkomandi starvsøki, heldur enn á formligar upptøkutreytir og avmarkingarreglur fyri upptøku.

Fyri ung, sum koma beinleiðis úr fólkaskúlanum (9. flokki), og fyri ognir, sum hava tørv á tí, verður sett sum krav, at tey í minsta lagi hava 1 árs starvsligar royndir eftir útbúgving. Sum útbúgving verður mett, at t.d. stuðulsútbúgving á yrkisskúla er eitt hóskandi upptøkugrundarlag hjá teimum, sum ikki lúka vanligu upptøkutreytirnar.

Orsøkin til hesi krøv er, at mett verður, at útbúgvingarstøðið í 9. flokki ikki í sjálvum sær er nøktandi grundarlag fyri at fara undir útbúgving til heilsuhjálpara. Samstundis verður mett neyðugt, at ung, ið koma beinleiðis úr 9. flokki, hava tørv á at mennast meira fakliga og persónliga til tess at megna tey krøv, sum fylgja við útbúgvingini til heilsuhjálpara. Mett er, at kravið um í minsta lagi at hava 1 árs starvsligar royndir ella útbúgving gevur næmingunum munandi betri møguleikar at fyritreika seg til at fara undir útbúgvingina, heldur enn bert at áseta eitt aldursmark.

Aðrar royndir enn tær omanfyri nevndu, eru serliga ætlaðar tilkomnum, sum ikki hava 9. flokk. Her verður serliga hugsað um teir heimahjálparar, sum eru í skipanini í dag. Umframt at fáa atgongd til hesa útbúgving eftir hesi grein, kunnu teir fáa stytt lærutíðina, um teir lúka krøvini í § 10, stk. 4.

Til § 5 og § 8. Upptøkukrøvini til heilsuøktaraútbúgvingina er annaðhvørt lokin útbúgving til heilsuhjálpara ella onnur viðkomandi útbúgving á miðnámsstigi, t.d. viðkomandi støðisútbúgving á yrkisskúla.
Tann, sum í minsta lagi hevur 1 árs førleika, grundaðan á annaðhvørt viðkomandi útbúgving ella starvsroyndir ella eina samanseting av hesum báðum, hevur eisini atgongd til heilsuøktaraútbúgvingina. Her verður m.a. hugsað um útbúgvingar, sum ikki eru nevndar í § 5, stk. 1, nr. 3. Førleikakrøvini svara í slíkum førum til krøvini sambært § 5, stk. 1, nr. 1.

Til §§ 6 og 7. Stuðuls-, røktar- og umsorganarøkið fevnir um eitt so stórt útbúgvingar- og arbeiðsøki, at tað verður mett at vera grundarlag fyri sjálvstøðugari útbúgvingarskipan á jøvnum føti við aðrar úthúgvingarskipanir. Javnsetanin við aðrar útbúgvingar setir krøv um eina greiða profilering og uppbygging, grundað á fyritreytir og krøv fyri hetta øki.

Útbúgvingin til heilsuhjálpara varir 1 ár og útbúgvingin til heilsuøktara 1½ ár. Útbúgvingarnar fevna um bæði starvsligu læru á upplæringarplássum og undirvísing í skúla í lutfallinum 2 til 1, tó smb. § 6, stk. 2, og § 7, stk. 2.

Til § 9. Næmingi, sum hevur tað fyri neyðini, kann fáa serundirvísing og annan sernámsfrøðiligan stuðul. Næmingur kann eisini fáa ráð og vegleiðing viðvíkjandi útbúgvingini og persónligum viðurskiftum. Her verður eisini hugsað um ráð og vegleiðing, áðrenn farið verður undir útbúgvingina.

Til § 10, stk. 1. Skúlaundirvísingin í sambandi við útbúgvingina til heilsuhjálpara fevnir um kravdar lærugreinir og vallærugreinir. Kravdu lærugreinirnar fevna um fylgjandi fakøki:

- Praktiskar yrkislærugreinir,
- Mentanarakliviletsfakligar yrkislærugreinir
- Pedagogisk-psykologiskar yrkislærugreinir
- Almanna- og samfelagsfakligar yrkislærugreinir
- Yrkislærugreinir viðvíkjandi røkt.

Praktisku yrkislærugreinirnar fevna um føðslulæru, húsarhald, herundir reingerð, vasking, innkeyp, matgerð, arbeiðisrørslur og lyftiteknikk, umframt persónligan stuðul, herundir umsorgan, persónligt reinlæti, ør og ílæting o.a.

Starvsliga upplæringin í sambandi við útbúgvingina til heilsuhjálpara fevnir um tíðarskeið, sum í høvuðsheitum fevna um arbeiðsligan og persónligan stuðul, aktivering og grundleggjandi sjúkrarøkt.

Málsetningurin við starvsligu upplæringini er, at næmingarnir:

- fáa førleika at røkja uppgávur í sambandi dagligu lívsháttin hjá borgaranum, herundir at vísa fyrilit fyri orku og førleika hjá borgaranum.

- nýta rættar arbeiðshættir og støður, lyfta á rættan hátt og nyta røttu hjálpartólini,
- fáa førleika at veita vanligan aktivitets- og umsorganartorv,
- fáa førleika at siggja tekin um broytingar í trivnaðar- og heilsustøðuni,
- at duga at framleggja slíkar eygleiðingar, og í tí sambandi at geva sær far um egið ábyrgdar- og heildarøki, og
- fáa førleika at røkja grundleggjandi sjúkrarøktaruppgávur.

Skúlaundirvísingin í sambandi við útbúgvingina til heilsurøktara fevnir um kravdar lærugreinir og valfrulærugreinir. Kravdu lærugreinirnar fevna um fylgjandi fakøki:

- Yrkislærugreinir viðvíkjandi fyriskipan
- Almanna- og samfelagsfakligar yrkislærugreinir
- Mentanaraktivitetsfakligar yrkislærugreinir
- Pedagogiskar-psykologiskar yrkislærugreinir
- Medisinskar yrkislærugreinir
- Yrkislærugreinir viðvíkjandi sjúkrarøkt

Yrkislærugreinir viðvíkjandi fyriskipan fevna um arbeiðs- og leiðsluskipan, samstarvslæru, arbeiðsmarknaðarviðurskifti og arbeiðsumhvørvi.

Starvsliga upplæringin í sambandi við útbúgvingina til heilsurøktara fevnir um longri úðurskeið, sum í høvuðsheitum fevna um umsorgan, aktivering og grundleggjandi heilsu- og sjúkrarøkt.

Málsetningurin við starvsligu upplæringini er, at næmingarnir:

- fáa førleika at meta um tørv og sjálvstøðugt at fremja grundleggjandi heilsu- og sjúkrarøkturuppgávur,
- fáa førleika at meta um tørv,
- tilrættaleggja og sjálvstøðugt fremja aktiverandi og umsorganaruppgávur, við støði í heildarstøðuni hjá borgaranum,
- fáa førleika í tvørfakligum samstarvi og trygd í arbeiðinum innan ábyrdar- og heimildarøkið hjá heilsurøktarum,
- fáa førleika at siggja tekin og staðfesta eydkenni við vanligum somatiskum og sálarligum sjúkum, og taka hóskandi stig í hesum sambandi,
- kunnu geva heilivág sambært galdandi vegleiðingum,
- kunnu staðfesta og taka samábyrgd til tess at fyribyrgja skaðiligum árinum á trivnað og heilsu, og
- kunnu røkja samskipandi og vegleiðandi uppgávur, umframt undirvísing við tilknyti til arbeiðsøkið.

Til § 10, stk. 3. Almennar lærugreinir, sum t.d. altsfrøði, evnafrøði støddfrøði og málsligar lærugreinir, kunnu takast móti stytting av starvsvenjingini. Hesar lærugreinir kunnu takast samstundis sum sjálv útbúgvingin fer fram. Næmingurin fær frí frá starvsvenjingini fyri at taka lut í undirvísingini í almennu lærugreinunum. Um skúlin ikki gevur undirvísing í tílíkum almennum lærugreinum, kunnu tær takast á øðrum góðkendum skúla.

Til § 10, stk. 4. Landsstýrismaðurin leggur dent á, at tað í mest møguligan mun verður tikið fyrilit fyri útbúgvingum ella starvsroyndum, ið umsøkjarar hava frammanundan, soleiðis at næmingarnir ikki verða noyddir at taka partar av útbúgvingini, sum teir longu frammanundan hava. Talan nytist ikki burturav at verða um tílíkar fyritreytir á almanna- og heilsuøkinum, men kann eisini verða tilsvarandi fyritreytir á øðrum avvarðandi starvsøkjum, sum kunnu metast ájavnt við slíkar fyritreytir á almanna- og heilsuøkinum.

Landsstýrismaðurin ásetur reglur um, at næmingar við viðkomandi útbúgvingum ella starvsligum fyritreytum skulu sleppa undan pørtum av útbúgvingunum. Tó kann ikki gevast loyvi til, at næmingar sleppa und-

an royndum fyri samlaðu útbúgvingina, ella fyri serliga týðandi partar av útbúgvingini í tílíkan mun, at útbúgvingin ella royndir ikki kunnu metast at verða gjøgnumførdar.

Heimahjálparar, sum seinastu 5 árini hava starvast við beinleiðis stuðuls-, røktar- og umsorganaruppgávum í samanlagt minst 3 ár, við minst 24 arbeiðstímum um vikuna, hava møguleika at útbúgva seg til heilsuhjálpara. Teir skulu taka somu skúlaundirvísing sum heilsuhjálparar, men av tí at teir hava nógvar royndir sum heimahjálparar, fáa teir góðskrivað tann partin av starvsvenjingini. Við at velja hesa loysnina varir útbúgvingin bert 26 vikur. Útbúgvingin fevnir um ástøðiliga undirvísing í 12 vikur og starvsvenjing í 14 vikur á røktarheimum, eldrasambyluni ella á eldratilhaldum (dagtilhaldum).

Sjúkrahjálparar, sum seinastu 5 árini hava starvast við beinleiðis stuðuls-, røktar- og umsorganaruppgávum í samanlagt minst 3 ár, við minst 24 arbeiðstímum um vikuna, hava møguleika at útbúgva seg til heilsurøktara við at taka ½ árs ástøðiligа undirvísing og ½ árs starvsvenjing innan somatiska, psykiatriska og primera økið. Starvsvenjingin verður løgd soleiðis til rættis, at sjúkrahjálparar, hvørs starvsroyndir serliga stava frá einum av nevndu starvsøkjum, fáa meginpartin av starvsvenjingini innan hini bæði starvsøkini ið teir ikki hava. T.d. skal ein næmingur við royndum á somatiska økinum einamest fáa starvsvenjing innan psykiatriska og primera økið. Á henda hátt verður roynt at tryggja, at næmingarnir fáa kunnleika til øll viðkomandi starvsøki.

Røktarheimsassistentar, sum seinastu 5 árini hava starvast við beinleiðis stuðuls-, røktar- og umsorganaruppgávum í samanlagt minst 3 ár, við minst 24 arbeiðstímum um vikuna, hava møguleika at útbúgva seg til heilsurøktara við at taka ástøðiligа undirvísing í 8-10 vikur og starvsvenjing í 13-16 vikur. Starvsvenjingin skal í mestan mun takast á somatiska økinum. Eftir lokna upptøkuroynd eru møguleikar fyri at góðskriva upp til 1 ár og 3 mánaðir til sjúkrasystraútbúgvingina.

Røktarar (pleygarar), sum seinastu 5 árini hava starvast við beinleiðis stuðuls-, røktar- og umsorganaruppgávum í samanlagt minst 3 ár, við minst 24 arbeiðstímum um vikuna, hava møguleika at útbúgva seg til heilsurøktara, við at taka ástøðiligа undirvísing í 15-18 vikur og starvsvenjing í 13-16 vikur. Starvsvenjingin skal í mestan mun takast á primera økinum.

Í Danmark kunnu *ítrivsvegleiðarar* søkja um góðskriving fyri útbúgving sína í teimum nýggju almanna- og heilsuútbúgvingunum.

Til § 11. Skúlin gevur prógvskjal eftir lokna heilsuhjálpara- og heilsurøktarautbúgving. Prógvið skal vísa úrslitini av teim royndum, ið tiknar eru, úrslitini av starvsligum uppgávum og støðumetum. Royndirnar í sambandi við skúlagongdina skulu vera skrivligar, munnligar ella bæði skrivligar og munnligar. Starvsvenjingin og kravdar starvsligar uppgávur verða mettar við støðuroyndum. Útbúgvingarnar enda við einari ástøðisroynd. Fyri teir næmingar, sum fáa stytt um lærutíðina eftir § 10, stk. 4, eru somu reglur galdandi fyri royndir og døming sum fyri vanligar næmingar.

Tað starvsheitið, ið útbúgvingin gevur rætt til, skal standa á prógvskjalinum, sum annars eisini skal vísa fakliga útbúgvingarøkið, tímatalið, longdina á starvsvenjingini og hvørjum starvsligum upplæringarplássum, næmingurin hevur verið á.

Til § 12. Undirvísingin í heilsuhjálpara- og heilsurøktarautbúgvingunum fer fram í skúla, sum er góðkendur av landsstýrismanninum til at geva hesa útbúgving, smb. § 10.

Til § 13. Útbúgvingarráðið góðkennir og tryggjar torvin á upplæringarplássum saman við skúlanum. Vegleiðingin og venjingin, sum næmingurin skal fáa á upplæringarplássinum í útbúgvingini, skal veitast av starvsfólki, ið hevur neyðugan førleika. Skúlin vegleiðir upplæringarplássini um tilrættaleggingina av hesum.

Til § 14 og § 17. Leiðsla skúlans hevur fakligu ábyrgdina av, at útbúgvingarnar verða framdar innan ásettu karmarnar í hesi lóg, og hevur eisini fyrisitingarligu ábyrgdina, umframt fíggjarligu ábyrgdina innan játanina til skúlan.

Til § 15. At skúlagongdin er ókeypis fyri næmingarnar merkir, at skúlin ikki kann krevja gjald frá næmingum fyri skúlagongdina ella fyri upplæringina á upplæringarplássum.

Høvuðsreglan er, sum í tí donsku skipanini, at tað vanliga undirvístingartilfarið er ókeypis fyri næmingarnar, men kann landsstýrismaðurin eftir ummæli frá útbúgvingarráðnum gera reglur um, at næmingarnir sjálvir skulu rinda undirvísingartilfarið ella partar av tí.

Til § 16. Landsstýrismaðurin ásetur tær nærri reglurnar um leiðsluviðurskiftini í útbúgvingunum eftir ummæli frá útbúgvingarráðnum.

Tað er leiðsla skúlans, sum setir í starv og loysir úr starvi lærarar og onnur starvsfólk skúlans.

Landsstýrismaðurin ásetur eftir ummæli frá útbúgvingarráðnum reglur um førleikakrøvini til skúlans leiðslu og lærarar.

Til §§ 18, 19 og 20. Landsstýrismaðurin setir eitt útbúgvingarráð. Limirnir skulu umboða og hava faktigt innlit í tey arbeiðsøki, sum lógin um almanna- og heilsuútbúgvingarnar fevnir um.

Ráðsskipanin hevur til endamáls at geva hesum arbeiðsøkjum neyðuga ávirkan á útbúgvingarskipanina, so hon í mest møguligan mun samsvarar við ynskini fyri avvarðandi arbeiðsøki.

Ráðið viðger yvirskipað mál og ger ummæli til landsstýrismannin samhæri teim heimildum, tí eru givnar í hesi lóg. Gjøllari reglur viðvíkjandi útbúgvingarráðnum verða ásettar av landsstýrismanninum.

Til § 21. Lesiætlanirnar verða gjørdar við støði í teimum av landsstýrisnamninum góðkendu útbúgvingarreglum, smb. §§ 3 og 10.

Til § 22 og § 23. Kærur um avgerðir skúlans í málum viðvíkjandi útbúgvingunum, undirvísingini og prógtøkunum skulu sendast leiðslu skúlans, sum beinanvegin sendir kæruna til landsstýrismannin saman við egnu viðmerkingum sínum, ella til eina kærunevnd, um so er, at landsstýrismaðurin smb. § 23 í lógaruppskotinum hevur lagt avgerðir í kærumálum til slíka kærunevnd.

Til § 24. Við gildissetan 1. juli 1998, verður roknað við, at útbúgvingarnar verða settar í verk við skúlaársbyrjan 1998/99, t.v.s. frá august 1998.

1. viðgerð mánadagin 16. mars 1998. Uppskotið vard brint í mentanarnevndina.

Málið fall burtur sbr. stýrisskipanarlógini § 15 stk. 3, tí at løgtingsval var 30. apríl 1998, og málið ikki var liðugt viðgjørt á tingi fyri valið.

Fl.-jur. 2119-3/93

132 Uppskot til løgtingslóg um støðisútbúgving innan fyrisiting, handils- og skrivstovuyrki (FHS-útbúgving)

Ár 1998, hósdagin 5. mars, legði Eilif Samuelsen, landsstýrismaður, vegna landsstýrið fram soljóðandi

Uppskot
til
løgtingslóg um støðisútbúgving innan fyrisiting, handils- og skrivstovuyrki
(FHS-útbúgving)

Kapittul 1
Stevnumið og bygnaður

§ 1. Landsstýrismanninum í undirvísingarmálum verður heimilað at skipa fyri støðisútbúgving innan fyrisitingar-, handils- og skrivstovuøkið og hava eftirlit við henni.

§ 2. Útbúgvingin gevur neyðuga grundarlagið undir framhaldandi yrkisútbúgving eftir yrkisútbúgvingarlógini, undir hægri handilspróvtøku eftir lógini um hægri handilsútbúgving og undir einum sjálvstøðugum prógvi.

Stk. 2. Sum støði undir yrkisútbúgving varir útbúgvingin annaðhvørt eitt ella tvey ár, og verður hon samskipað við teimum framhaldandi skúlapørtunum av yrkisútbúgvingunum innan fyrisitingar-, handils- og skrivstovuøkið.

Stk. 3. Sum støði undir hægri handilsútbúgving verður útbúgvingin skipað sum eitt støðisár og samskipað við hægru handilsútbúgvingina.

§ 3. Sum støði undir og partur av eini yrkisútbúgving skal útbúgvingin hava tey stevnumið, sum eru nevnd í yrkisútbúgvingarlógini.

Stk. 2. Útbúgvingin skal annars sum ein samanbangandi heild miða ímóti at geva næmingunum persónligar, samfelagsligar, búskaparligar, fyriskipanarligar, málsligar, mentanarligar, samskiftisligar, kanningartøkniligar og tænastuligar førleikar. Við støði í føroyskum máli og føroyskari mentan skal útbúgvingin leggja dent á at skilja vinnulívskorini og korini fyri vinnulívsmenning bæði í heimligum og altjóða høpi.

§ 4. Útbúgvingin kann skipast sum partvís útbúgving fyri næmingar, sum hava lokið aðra útbúgving á minst sama stigi sum ein fullførd útbúgving eftir hesi lóg.

Stk. 2. Skipað kann verða fyri framhaldandi yrkisskeiðum og portum av verkligari læru, sum neyðug eru fyri at fullføra eina yrkisútbúgving innan fyrisitingar-, handils-, og skrivstovuøkið.

Stk. 3. Skipað kann verða fyri styttri vinnuligum framhaldsskeiðum.

Stk. 4. Skipað kann verða fyri undirvísing í støkum lærugreinum.

Stk. 5. Skipað kann verða fyri undirvísing fyri sjálvlesandi og í fjarlesti.

§ 5. Útbúgvingin fer fram í skúlum, sum landsstýrismaðurin hevur góðkent.

Stk. 2. Landsstýrismaðurin ásetur eftir umrøðu frá yrkisútbúgvingarráðnum, smb. løgtingslóg um yrkisútbúgvingar, nærri reglur um innihaldið í førleikakrøvunum smb. § 3, stk. 2 og um innihaldið í teimum serligu skipanunum smb. § 4.

Kapittul 2
Upptøka

§ 6. Næmingur, sum hevur lokið fráfaringarroynd fólkaskúlans, ella sum hevur í minsta lagi samsvarandi kunnleikastøði, kann eftir umsókn takast upp í útbúgvingina, um upptøkuskúlin metir, at umsøkjarin er førur fyri at fylgja undirvísingini á nøktandi hátt og at taka útbúgvingina til ásetta tíð.

Stk. 2. Næmingur skal kunna velja millum tær undirvísingarbreytir, sum skúlin hevur, og sum skúlin metir hann skikkaðan til.

Stk. 3. Sum treyt fyri upptøku kann skúlin krevja, at næmingurin tekur ávísar lærugreinir ella ávísa eykaundirvísing.

Stk. 4. Sama treytir, sum ásettar eru í stk. 1. og 3, skulu setast næmingi, sum verður tikin upp eftir § 4, stk. 1, 4 ella 5.

Stk. 5. Landsstýrismaðurin tryggjar í mest møguligan mun, at skikkaðir næmingar smb. stk. 1 kunnu verða tiknir upp í útbúgvingina.

Stk. 6. Landsstýrismaðurin ásetur gjøllari reglur um og treytir fyri upptøku í útbúgvingina ella partar av henni.

§ 7. Umsøkjari verður tikin upp í tann skúla, sum hann søkir inn á, treytað av at skúlin hevur pláss.
Stk. 2. Landsstýrismaðurin kann áseta reglur um samstarv millum skúlar um býti av næmingum.
Stk. 3. Landsstýrismaðurin kann í serligum føri áleggja skúla at seta útbúgvingar eftir hesi lóg ella partar av teimum á stovn og at taka upp eitt ávíst tal av næmingum.

Kapittul 3
Innihaldið í útbúgvingini

§ 8. Støðisútbúgvingin innan fyrisitingar-, handils- og skrivstovuøkið fevnir um grundlærugreinir, yrkislærugreinir og vallærugreinir.
Stk. 2. Landsstýrismaðurin kann áseta reglur, at undirvíst verður í øðrum lærugreinum.
Stk. 3. Grundlærugreinirnar eru býttar eftir náms-grein í
1) kravdar lærugreinir, sum skulu tryggja fakligu breiddina yvirhøvur,
2) støðið undir framhaldandi stigum og flest møguligar førleikat smb. § 3, og
3) vallærugreinir, sum eru neyðugt støði undir framhaldandi stigum.

Stk. 4. Grundlærugreinirnar eru skipaðar í grundstig og kravt stig .
Stk. 5. Yrkislærugreinirnar skulu í stóran mun styðja grundlærugreinirnar og binda tær saman fyri at røkka málunum í § 3 , og kunnu annars vera støði undir serlærugreinum ella serlærugreinum, sum geva næmingunum serligan yrkisførleika.
Yrkislærugreinir eru býttar í
1) økislærugreinir, sum fyri stóran part verða framdar undirvísingarliga sum evnisundirvísing, og
2) handilsfak, sum er felagsheitið fyri avsettar tímar til aðra serliga undirvísing.

Stk. 6. Vallærugreinir eru
1) grundlærugreinir, sum ikki eru kravdar,
2) grundlærugreinir á hægri stigum enn kravt verður,
3) yrkislærugreinir,
4) aðrar lærugreinir, sum tøkta áhugamál og tørv næmingsins.

§ 9. Næmingur, sum tekur útbúgving eftir § 2, stk. 2 eftir tveimum árum, skal hava kravdu grundlærugreinirnar, í minsta lagi 5 økislærugreinir, 2 vallærugreinir og handilsfak.
Stk. 2. Næmingur, sum tekur útbúgving eftir § 2, stk. 2 eftir einum ári ella eftir § 2, stk. 3, skal hava kravdu grundlærugreinirnar, í minsta lagi 1 økislærugrein, í minsta lagi 1 vallærugrein og handilsfak.

§ 10. Skúlin kann, tá talan er um evnisundirvísing, víkja frá tímabýttu lærugreinaundirvísingini.
Stk. 2. Landsstýrismaðurin ásetur gjøllari reglur um tey í stk. 1 nevndu viðurskifti.

§ 11. Undirvísingin verður løgd til rættis við ynskjum næmingsins í huga og lagað eftir fortreytum og áhuga hansara.
Stk. 2. Serundirvísing og annar sernámsfrøðiligur stuðul kann verða givin næmingi, sum hevur tað fyri neyðini, eftir reglum sum landsstýrismaðurin ásetur.
Stk. 3. Einstaka næmingtnum verður boðin útbúgvingar- og yrkisvegleiðing eftir reglum, ið landsstýrismaðurin ásetur.
Stk. 4. Fyri næmingar, sum vegna sjúku ikki kunnu fylgja vanligu undirvísingini á skúlanum í longri tíð, verða undirvísingartiltøk framd eftir reglum um sjúkraundirvísing, ið landsstýrismaðurin ásetur.

§ 12. Landsstýrismaðurin ásetur eftir ummæli frá yrkisútbúgvingarráðnum, sbr. løgtingslóg um yrkisúthúgvingar, gjølligari reglur um lærugreinarøðir og innihald av grundlærugreinum, yrkislærugreinum og vallærugreinum, tímatal og á hvøjum stigi tær kunna takast, smb. § 8 og 9.

Kapittul 4
Prógtøka

§ 13. Undirvísingin til støðisútbúgving innan fyrisitingar-, handils- og skriv-stovuøkið endar við prógtøku.

§ 14. Landsstýrismaðurin ásetur eftir ummæli frá yrkisútbúgvingarráðnum gjølligari reglur um prógtøku, herfimillum royndir og metingar í skúlaárinum, krav og prógtøkuuppgevingar, prógtøkur, prógdøming, prógtøl og ummæli, og um hvussu lærugreinametini í teimum ymsu stigunum og onnur avrik telja við í tí vigaða miðaltalinum.

Kapittul 5
Fígging

§ 15. Landskassin rindar rakstrarútreiðslurnar av góðkendari undirvísing.

Stk. 2. Landskassin kann veita studning til royndar- og menningarvirksemi, eftirútbúgving, útbúgving av lestrarvegleiðarum og til faklig skeið.
Stk. 3. Landsstýrismaðurin ásetur gjøllari reglur um áseingarnar í stk. 1 og 2.

§ 16. Undirvísingin er ókeypis fyri næmingarnar.
Stk. 2. Landsstýrismaðurin ásetur nærri reglur um gjøld fyri stakgreinalestur, sjálvlesandi og fjarlesandi í sambandi við undirvísing og prógtøku.
Stk. 3. Næmingarnir skulu sjálvir útvega sær bøkur og annað undirvísingartilfar.
Stk. 4. Landsstýrismaðurin kann heimila skúlunum at taka gjald fyri tjóstøk, ið verða nytt í undirvísingini.

Kapittul 6
Lærarar og prógdómarar

§ 17. Lærararnir skulu hava dagførdan fakligan og námsfrøðiligan førleika, sum ger teir skikkaðar at undirvísa í teimum lærugreinum og teimum stigum, teir verða settir til.
Stk. 2. Lærarar í lærugreinum á kravdum stigi skulu hava eina bóskandi úthúgving frá hægri lærustovni.
Stk. 3. Setan í fast starv sum lærari ella skúlastjóri er treytað av, at viðkomandi hevur staðið pedagogikum.
Stk. 4. Prógdómari skal í minsta lagi lúka somu førleikakrøv sum lærarin í viðkomandi lærugrein.
Stk. 5. Landsstýrismaðurin ásetur gjølligari reglur um førleikakrøv, herímillum um útbúgving og praktiskar royndir, smb. stk. 1 og 2 og um pedagogikum smb. stk. 3.
Stk. 6. Landsstýrismaðurin kann í serligum føri gera undantak frá áseingunum í hesi grein.

Kapittul 7
Næmingaskyldur

§ 18. Næmingarnir hava møtiskyldu, skyldu at lata inn allar kravdar skrivligar uppgávur og skyldu at ganga eftir innanhýsis- og lestrarreglum skúlans.
Stk. 2. Landsstýrismaðurin kann áseta gjølligari reglur um tey í stk. 1 nevndu viðurskifti.

Kapittul 8
Kærur

§ 19. Kærur um avgerðir skúlastjórans kunnu leggjast fyri landsstýrismannin.
Stk. 2. Kærast kann í seinasta lagi 1 viku eftir at kærarin hevur fingið fráboðan um avgerðina.
Stk. 3. Landsstýrismaðurin ásetur gjøllari reglur um, hvørjar avgerðir kunnu kærast og um nummagongdina.

Kapittul 9
Aðrar ásetingar

§ 20. Landsstýrismaðurin kann geva skúlastjóranum boð í námsfrøðiligum málum.

§ 21. Landsstýrismaðurin kann í serligum førum víkja frá reglunum í hesi lóg fyri at fremja royndar- og menningarvirksemi.
Stk. 2. Royndar- og menningarvirksemi má ikki minka um møguleikar næmingarna at nyta teirra útbúgving sum støði undir framhaldslestri, og ei heldur um rættindi og møguleikar teirra á annan hátt.
Stk. 3. Landsstýrismaðurin kann í serligum førum víkja frá reglunum í hesi lóg, um heilt serligar umstøður gera tað neyðugt.

§ 22. Skúlin skal hava næmingarnar tryggjaðar móti skaðum, sum teir kunnu verða fyri undir skúlagongdini.

Kapittul 10
Gildisskipan

§ 23. Henda lóg fær gildi 1. august 1998. Samstundis fer úr gildi løgtingslóg nr. 49 frá 5. mai 1987 um grundútbúghving innan fyrisitingar-, handils- og skrivstovuøkið sum broytt við § 9 í løgtingslóg nr. 67 frá 7. juni 1996 um broyting í ymiskum løgtingslóg um undirvísing.
Stk. 2. Landsstýrismaðurin ásetur reglur um, hvussu lógin verður nytt fyri útbúgvingar, sum eru byrjaðar, men ikki endaðar, áðrenn henda lóg fær gildi.

Amennar viðmerkingar

Samtbært *løgtingslóg um lærlingaváttanarskipti*, nr. 29 frá 12. oktober 1954 ásetur Lærunarráðið í samráð við yrkini útbúgvingarreglurnar í lærlingaútbúgvingunum, meðan Lærunarráðið, í samráð við skúlamyndugleikarnar, fyrisetur ta til leruna hoyrandi skúlagongd. Lógin ásetur lærusáttmálaskyldu fyri allar lærlingar og ger skúlagongd til ein kravdan part av útbúgvingini. Lógin heimilar yrkisroyndum, men tað verður ikki krevt av handils- og skrivstovulærlingum.

Sambært *løgtingslóg um grundútbúgving innan fyrisitingar-, handils- og skrivstovuøkið*, nr. 49 frá 5. mai 1987 (í hesum sambandi hereftir nevnd FHS) er FHS-skipanin ein 1 ára stoðisútbúgving og samstundis ein 3 ára yrkisútbúgving.

FHS-lógin, sum hevur sín uppruna í lógini frá 30. juni 1983, tá ið FHS kom, er ikki tíðarhóskandi longur. Harafturat kemur, at uppskotið til eina nýggja yrkisútbúgvingarlóg, umframt at fevna um innihaldið í lærlingalógini frá 1954, eisini í stóran mun fevnir um verandi FHS-lóg.
Tá ið ynskt verður, at gamla FHS-lógin verður sett úr gildi, og at ein heilt nýggj kemur í staðin fyri, hevur hetta hesar høvuðsorsøkir:

- Verandi FHS-lóg er ófullfíggjað m.a. viðvíkjandi endamálsorðing, atgongureglum, undirvísingarinnihaldi, prógvtøkuviðurskiftum, fíggingareglum, reglum um lærararørleika, bygnaði og fyrisitingarviðurskiftum.
- Tann nýggja yrkisútbúgvingarlógin fevnir um lærlingarviðurskifti yvirhøvur, men ikki um nágreiniligari viðurskifti viðvíkjandi skúlagongdini hjá lærlingum og øðrum næmingum í stoðisútbúgvingini.
- Lógin reglubindur útbúgvingina og samband hennara við lógina um hægri handilsútbúgving (í hesum sambandi hereftir nevnd HH), yrkisútbúgvingarlógina og við aðrar lógir og viðurskifti.

Í uppskotinum um nýggja FHS-lóg verður farið frá tí partinum í verandi lóg, sum sigur, at FHS er ein 3 ára yrkisútbúgving. Uppskotið leggur seg eftir at javna onnanfyri nevndu viðurskifti og onnur, og at taka upp nýggjar tættir, sum umrøddir verða í viðmerkingunum til lógaruppskotið.

FHS-lógin fær eftir uppskotinum try endamál:

- At vera stoðí undir eini lærlingaútbúgving.
- At vera stoðí undir eini framhaldandi HH-útbúgving.
- At vera ein útbúgving í sær sjálvari.

Um 2. stoðisár verður sett í verk frá august 1999 at rokna, verður mett, at um vit ganga eftir núverandi næmingatali og flokkum, kann roknast við, at 2 flokkar í Havn og 1 á Kambsdali velja 2 ára stoðisútbúgvingina. Men vegna samlesing við teir næmingar, sum velja HH útbúgvingina og vegna samlesing í yrkislærugreinum, "serligari handilsligari undirvísing" og í vallærugreinum, og vegna tynning í stigmøguleikunum, kann nógv vinnast inn aftur. Roknast kann við at færri næmingar fara 38 vikur á skeið í Danmark.

Verða møguleikarnir við 2 ára skipanin framdir, verða sum nevnt 3 flokkar tiknir upp aftanat, og er hetta mett at hava ein meirkostnað upp á umf. 1 mió kr. um árið, tó fyrst frá frá 1999 at galda.

Í verandi fíggjatárið (1998) standast ongar meirútreiðslur fyri landskassan av at seta nýggju lógina í gildi. Av tí at nevndin, sum hevur gjørt uppskotið, hevur havt breiða sapnanseting av umboðum frá vinnuni, yrkisfelagum og viðkomandi stovnum, er uppskotið bert sent handilsskúlunum, herúttillum lærara- og næmingaráðunum og Lærarafelag Handilsskúlans til hoyringar.

Serligar viðmerkingar
Viðmerkingar til hvørja einstaka lógargrein

Ad. § 1. Heimildin at skipa fyri stoðisútbúgving innan fyrisiting-, handils- og skrivstovuøkið (FHS) er sml. § 2 í rammulóg nr. 54 frá 14. februar 1979.

Stoðisútbúgvingin er stoðið undir yrkisútbúgvingunum og 1. ári av hægri handilsútbúgving (HH). Hetta merkir, at 1. árið av HH framvegis er undir FHS-skipanini.

Ad. § 2, stk. 1. Sjálvstoðugu prógvið kann takast bæði eftir stk. 2. og 3 og skal kunna brúkast sum stoði undir m.a. styttri framhaldandi vinnudívsútbúgvingum sml. § 4, stk. 3.

Ad. § 2, stk. 2. Hetta merkir, at ein partur av næmingunum koma at ganga í skúla 2 ár í støðis-útbúgvingini í staðin fyri 1 ár eftir verandi skipan. Hinvegin sleppa hesir næmingar undan 3., 4., og 5. skúlaskeiði í lærutíðini og fáa beinleiðis atgongd til øll fylgjandi skúlaskeið fyri yrkisútbúgvingar á tí øki, sum henda lóg fevnir um.

Næmingur kann fara í læru eftir lokið 1. skúlaár og síðani taka 3., 4., og 5. skúlaskeið í lærutíðini, og at atgongd er ikki beinleiðis til allar yrkisútbúgvingar.

Ad. § 2, stk. 3. Støðisárið til IH1 gevur eisini atgongd til 2. skúlaárið á FHS. Samlsið kann verða í grundlærugreinum, ymisk stig í grundlærugreinum og yrkislærugreinum (evnisundirvísing), beruppií serliga handilsliga undirvísing, og vallærugreinir. Víst verður til § 8 í hesum sambandi.

Ad. § 3, stk. 1. Hesin partur av FHS-útbúgvingini hevur somu stevnumið sum tey í yrkisútbúgvingarlógini. Hetta letur seg væl gera. Stevnumiðini í yrkisútbúgvingarlógini eru orðað so breitt, at tey kunnu samsvara við stevnumiðini í stk. 2.

Ad. § 3, stk. 2. Ásetingin gevur eina neyvari ímynd av, hvat ið undirvísingin í øllum lærugreinum miðar ímóti, enn vanligt er í styttri endamálsorðingum.

Ad. § 4, stk. 1. Her verður fyrst og fremst hugsað um næmingar við students-, HT- ella HF-prógvi, sum eru í læru ella ætla sær at fara undir eina lærlingaútbúgving. Við "fullførda" útbúgving verður meint ein lokin støðisútbúgving eftir einum ella tveimum árum.

Ad. § 4, stk. 2. Framhaldandi yrkisskeið skal skiljast sum 3., 4. og 5. skúlaskeið og øll tey framhaldandi serskeiðini viðvíkjandi tí einstøku útbúgvingini, sum føroyskir lærlingar vanliga taka á donskum skúlum. Verða skeiðini bildin í Føroyum, er tað ikki avgjørt neyðugt, at tey skulu vera nett tey somu sum í donsku skipanini. Seinni partur av hesum stk. vísir til § 7, stk. 2 í uppskotinum um yrkisútbúgvingarlóg.

Ad. § 4, stk. 3. Her verður fyrst og fremst hugsað um at nokta skiftandi og brádliga íkomnan tørv av fólki við serligum førleikum í vinnuni.

Ad. § 4, stk. 4. Ætlanin er, at stakar lærugreinir sum dag- og kvøldundirvísing skulu kunna nytast sum ein partvísur møguleiki í eini skipaðari framhaldandi lærlingaútbúgving, har næmingatilgongdin er ov lítil til at skipa fyri sergreinasketiðum.

Ad. § 4, stk. 5. Við teimum framkomnu samskiftisamboðunum vit hava í dag, er tíðin búgvin at hava ásetingar um fjarlestur við í lógini.

Ad. § 5, stk. 1. Góðkenningin kann tilskila hvørjar partar av §§ 2 og 4. góðkentingin fevnir um.

Ad. § 6, stk. 1. At næmingur skal hava lokið fráfaringarroynd fólkaskúlans, er ein broyting í samsvari við nýggju fólkaskúlalógina. Undantøk kunnu tó gerast eftir hesi grein.

Ad. § 6, stk. 2. Tað eru 3 høvuðsbreytir at velja ímillum - smb. § 2, stk. 1. Møguleiki kann vera fyri samlestri, og fyrt, at næmingur skal kunna broyta lestrarleið ávegis.

Ad. § 6, stk. 4. Ásetingin er neyðug fyri at tryggja, at tað ikki er ov stórur munur á næmingaførleikunum, tá ið útbúgvingin byrjar.

Ad. § 6, stk. 5 og § 7, stk. 1. Greinirnar áleggja landsstýrismanninum í størst møguligan mun at tryggja skikkaðum næmingum pláss. Hetta er tó treytað av, at tær fíggjarligu fortreytirnar eru til staðar.

Ad. § 6, stk. 6. Landsstýrismaðurin ásetur gjøllari reglur um upptøku.

Ad. § 7, stk. 3. Um skúli ikki hevur allar útbúgvingarnar eftir §§ 3 og 4, skal landsstýrismaðurin kunna áleggja skúlanum at taka eina útbúgving upp, um hann heldur tað vera neyðugt.

Ad. § 8, stk. 1. Upphýtingin er í samsvari við upphýtingina í uppskotinum um lóg um yrkisútbúgvingar.

Ad. § 8, stk. 2. Ásetingin kann t.d. brúkast, tá ið nýggjar vinnur taka seg upp.

Ad. § 8, stk. 3. Dømi um grundlærugrein sum vallærugrein eru tyskt og støddfrøði. Fyri at koma inn á HH er kravt, at næmingur annaðhvørt skal velja tyskt ella støddfrøði á kravdum stigi í FHS, um ikki her til at fáa tað á 2. HH.

Ad. § 8, stk. 4. Í støðisútbúgvingin eru einans lærugreinastigini grundstig og kravt stig. Orsøkinar eru hesar:

- Lægri stig enn grundstig er av royndum ov lágt lærugreinastig at hava hjá teimum flestu næmingunum, sum koma úr fólkaskúlanum.
- Neyðugt er við kravdum stigi hjá næmingum, sum skulu á HH.
- Óneyðugt at leggja eitt lærugreinastig millum grundstig og kravt stig.
- Við tveimum lærugreinastigum er fyriliti tikið fyri ymsu forkunnleikunum og evnunum hjá næmingunum.

Viðmerkjast skal, at møguligt er at lesa eitt kravt stig, men velja at fara upp til prøvtøku í grundstigi.

Ad. § 8, stk. 5, nr. 1 og 2. Økislærugreinir eru lærugreinir, sum fevna um felags arbeiðsøki og -hættir innan fyri tey yntisku yrkisøkini.

Dømi um økislærugreinir eru:
- Figgingar,
- almenn umsiting,
- visuell marknaðarføring,
- mál og mentan,
- samskifti,
- sálarfrøði og tænasta,
- umhvørvi og tilfeingi,
- logistikkur, handilsskapur,
- "fgongdsetari",
- KT-ambod,
- grafisk framløga,
- fyrisiting og málsviðgerð,
- dekorasjón, formlist, aling og fiskaframleiðsla.

Dømi um serliga handilsligan undirvísing undir felagsheitinum "handilsfak" eru:
- Ymisk telduforrit,
- privatøkonomi, virkisvitjan,
- SJMU virksemi,
- lestrarferð,
- tvørfaklig málfacra,
- onnur tvørfaklig evni,
- fyrilestrar og list.

Um §§ 8 og 9 verða tiknar undir einum, er lagt er upp til eina umfatandi samskipan millum grundlærugreinir og yrkislærugreinir og millum allar lærugreinir yvirhøvur.

Ad. § 8, stk. 6. Møguleikarnir fyri vallærugreinum eru rættiliga opnir, t.e. at stórur møguleiki er hjá tí einstaka skúlanum at sermerkja seg og velja evni, serliga í 2 ára ruslinum.

Ad. § 9. Yrkislærugreinirnar verða framdar sum evnisundirvísing soleiðis, at næmingur velur ímillum 2 vallærugreinir til hvørt evni á 2 vikur. Hvørt evni inniheldur fleiri av endamálunum og førleikunum í § 2, og tey enda øll við einum skrivligum avrikt, og støðumet verður givtð fyri tað samtaða avrikið hesar báðar vikurnar.

Ad. § 10. Lærugreinir kunnu leggjast saman og tímar í viðkomandi lærugreinum samskipast.

Ad. § 11. Ásetingarnar eru vanligar og tær sonn sum í uppskotinum um lóg um yrkisútbúgvingar .

Ad. § 12. Henda áseting er nýggj. Hon ásetur, at yrkisútbúgvingarráðið skal gera ummæli viðvíkjandi reglum um lærugreinarøðir o.a.

Ad. §§ 13 og 14. Av tí at eftirmett eigur at verða eftir hvørt evnisundirvísingarskeið, er ikki neyðugt longur at hava "jóla-" og "vár"-royndir sum grundarlag undir ársmetum í viðkomandi lærugreinum.

Tann seinasta evnisvikan í hvørjum ári endar við einari verkætlan, sum fevnir um allar førleikar eftir § 3, og sum prógvtøka er í, tá ið endaligar prógvtøkur fara fram bæði árini.

Næmingar kunna gera seg lidnan við nakrar lærugreinir eftir 1. árið, hóast teir taka støðisútbúgvingina eftir 2 árum.

Ad. § 15, stk. 2. Ásetingin skal síggjast saman við § 17.

Ad. § 16. Ásetingarnar eru tær sonn sum í verandi lóg, burtur sæð frá, at fjarlestur er komin við.

Ad. § 17, stk. 2. Av tí at henda lógin leggur upp til, at undirvísingin so nógv sum gjørligt skal vera ein heild og at støðtsútbúgvingin er ein vinnurættað útbúgving, eru útbúgvingarkrøvini til undirvísingarførleika lýst í breiðari týdningi. Lærarar, sum undirvísa á FHS stigi, hava lutvíst metra av praktiskum royndum enn av akademiskum kunnleika, meðan tað øvugta er galdandi fyri lærarar, sum undirvísa á HH-stigi. Tí verður akademiskur førleiki ikki eitt avgjørt krav á øllum lærugreinastigum, men bara á kravdum-, mið- og hástigi. Frávik mugu kunna grundgevast við, at tørvir næmingarnna og skúlans verða betur nøktaðir, ella við, at annar útvegur ikki er.

Ad. § 17, stk. 4. Ásetingin er neyðug fyri einsháttaða døming.

Ad. § 17, stk. 6. Ásetingin er gjørd, fyri at loysast kann upp í serligum førum.

Ad. § 18. Hesar reglur eru í samsvari við tey almennu krøvini í øllum miðnámsútbúgvingunum.

Ad. § 19. Í kunngerð verður ásett, hvørji viðurskifti kærast kann um til landsstýrismannin, og um kærumannagongdina.

Ad. § 21, stk. 3. Nýggj áseting, sum skal kunna nytast í beilt serligum førum.

Ad. § 22. Við hvørt eru næmingar í starvsvenjing, á vitjanum á virkjum, námsferðum o.a. og tí kann tað verða neyðugt at hava teir tryggjaðar.

Ad. § 23. Lógin verður sett í gildi frá 1. august 1998. 2. støðisárið kann tó í fyrsta lagi hava gildi frá 1. august 1999.

1. viðgerð hósdagin 12. mars 1998. Uppskotið varð beint í mentamannanevndina.

Málið fall burtur sbr. stýrisskipanarlógini § 15 stk. 3, tí at løgtingsval var 30. apríl 1998, og málið ikki var liðugt viðgjørt á tingi fyri valið.

F.L.j.nr. 2105-19/93

133 Løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um stuðul til feskfiskaflotan

Ár 1998, hósdagin 5. mars, legði Jákup Joensen, løgtingsmaður, vegna seg sjálvan og løgtingsmenninar Sunni Jacobsen, Jørgen Niclasen, Jóannes Eidesgaard, Henrik Old, Jógvan Durhuus, Ingeborg Vuther, Lasse Klein, Jenis av Rana og Karl Robert Johansen fram soljóðandi

U p p s k o t
til
løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um stuðul til feskfiskaflotan

§ 1.

Í løgtingslóg nr. 34 frá 6. mars 1993 um stuðul til feskfiskaflotan við seinni broytingum verða gjørdar hesar broytingar:

1) Í § 4 verður sum nýtt stk. 2 sett: "Aftan á tey í stk. 1 nevndu 5 ár fáa tey skip í bólkunum 1, 2, 6 og 7, sum 1. mars 1998 vóru í skipanini og sum hava maskinorku 500 HK ella meira, ávikavist 65% og 35% av fløgustuðulinum eftir § 3 galdandi fyri árini 1998 og 1999."
2) § 4. stk. 2 - 4 verður hereftir § 4, stk. 3-5.

§ 2.

Hendan lóg fær gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd. Samstundis fer danskt teksturin úr gildi.

Viðmerkingar

Tað er politisk semja um, at fløgustuðulin til skipini skal avtakast. Men tað er ikki semja um, hvussu skjótt hetta skal gerast.

Í teirri umhugsan, sum er neyðug, eigur at verða hugsað um, hvussu skjótt vinnan kann laga seg til broyttu umstøðurnar. Í lutvíst eigur at verða havt í huga vandan, sum kann liggja í tí, at skipini frá tí betra og nýggjara endanum fara á húsagang og ent tá av landinum.

Vit vita, at ein hópur av skipum misti fløgustuðulin eftir 3 árum. Men her var talan um munandi bíligari skip og smærri upphæddir pr. skip, og so tað at fiskiskapurin, serliga eftir toski, tá batnaði munandi.

Tað hevur ikki verið ein nóg neyv politisk viðgerð av, hvat ið kann henda, um tann fløgustuðul, sum nú sambært lógini skal hakla uppat, eisini kemur at halda uppat.

Landsstýrismaðurin í fiskivinnumálum hevur boðað frá, at hann leggur einki uppskot fram í hesum máli. Hetta er orsøkin til, at undirritaðu løgtingsmenn leggja hetta uppskot fram. Hetta merkir, at løgtingið sum slíkt fær møguleika fyri at viðgera hetta málið nærri og kann tískil út frá hesi viðgerð taka støðu til, hvat ið skal henda í hesum máli.

Uppskotið merkir, at hjá skipabólkum
1 Lemmatrolarar frá 1977 og yngri.
2 Lemmatrolarar frá 1976 og eldri
6 Partrolarar frá 1984 og yngri og
7 Partrolarar frá 1980 til 1983

kemur fløgustuðulin at halda áfram tvey ár afturat, tó avtrappað soleiðis, at fyrsta árið verða goldin 65% og seinna árið 35%, og tá kemur fløgustuðulin at falla heilt burtur.

Kostnaðurin er í 1998 mettur til umleið 14,4 mió. kr. og í 1999 umleið 8 mió. kr. Peningurin verður tikin av teimum 40 mió. kr., sum eru settar av til fiskivinnuna á fíggjarlógini fyri 1998 konto 5.34.4.34 Nýggj lóggáva. Sí løgtingsmál nr. 1-13/1997: Uppskot um eykajáttanarlóg fyri mars 1998.

Málið fall burtur sbr. stýrisskipanarlógini § 15 stk. 3, tí at løgtingsval var 30. apríl 1998, og málið ikki var liðugt viðgjørt á tingi fyri valið.

134 Uppskot til samtyktar um lækkan av søluprísinum á drekkimjólk

Ár 1998, hósdagin 5. mars, legði Jenis av Rana, løgtingsmaður, vegna Miðflokkin fram soljóðandi

Uppskot
til
samtyktar

Vísandi á § 48, stk. 1., nr. 6, í Tingskipan Føroya Løgtings verður heitt á landsstýrið skjótast gjørligt at leggja fram løgtingslógaruppskot viðvíkjandi tiltøkum at lækka søluprísin á drekkimjólk.

Viðmerkingar

Tann 1. januar 1993 varð kvota sett á føroyska mjólkaframleiðslu. Avgerðin varð grundað á meting um, at ovasta mark var nátt fyri teirri nøgd av føroyskari drekkimjólk, ið kundi seljast.

Henda avgerð hevur ført til súg í teirri menning, sum fór fram á hesum týðandi vinnuøki okkara.

Sentralt í spurninginum um mjólkaframleiðsluna er prísurin. Í løtuni kostar 1 litur av mjólk góðar kr. 9,- frá handilsmanninum. Í sjálvum sær er hetta ein ørandi prísur fyri henda heilsufremjandi drykkin, væl meira enn í Danmark, og heilt burturvið verður tað, um vit meta saman við handilsprísin á øðrum tilboðum, sum børnunt okkara stendur í boði. Sodavatn fæst fyri heilt niður í kr. 5,-. fyri litarin, meðan litaða sukurvatnið (saftin) kann keypast fyri minni enn kr. 2.-. fyri litarin. Ei undur í, at nógvar føroyskar barnafamiljur í hesum kreppudøgum freistast at keypa tað bíliga, og harvið spara kærkomnar krónur.

Taparin í øllum hesum er barnið, sum sambært øllum serkunnleika so sáran tørvar heilsugevandi mjólkina. Annað í hesum sambandi er, at vit innflyta ikki so smáar nøgdir av útlendskari mjólk - umleið 500.000 litrar árliga - ein púra óneyðugur ørskapur.

Ein rímiligari, lægri mjólkaprísur hevði verið ein útrætt hond til komandi ættarliðið. Ikki unt hjá barnafamiljunum, skapað fleiri arbeiðspláss í vinnuni, minkað ávirkan av bæði útlendskari mjólk og sodavatni, og skundað undir uppdyrkanina av tí náttúrurikidømi, sum landbúnaðurin rókir.

Óivað eru fleiri vegir at náa hesum máli, lægri prísur á drekkimjólk. Mest víttgangandi, men kanska vandamiktasti hevði verið at tikið framleiðslukvoturnar av. Aðrir møguleikar eru at hækka barnafrádráttin ella at veita serstakan mjólkafrádrátt, men slíkar loysnir høvdu neyvan tryggja, at peningurin verður brúktur til tað, hann var ætlaður til.

Ein skilagóð loysn hevði verið at veitt sokallaðan niðurgreiðslustuðul til mjólkaframleiðaran, stuðul, sum varð oyramerktur til lækkan av drekkimjólkaprísinum, t.e. vanlig mjólk, hálvskúmað og skúmað, meðan parturin, sum fer til aðra framleiðslu, verður undantikin.

Viðmerkjast skal loksins, at seinast, slíkt mál var fyri á løgtingi, var á vári 1995, og var tað uppskot frá Miðflokkinum til samtyktar, sum tó ikki vann fram.

1. viðgerð fríggjadagin 13. mars 1998. Uppskotið verður beint í fíggjarnevndina.

Málið fall burtur sbr. stýrisskipanarlógini § 15 stk. 3, tí at løgtingsval var 30. apríl 1998, og málið ikki var liðugt viðgjørt á tingi fyri valið.

135 Uppskot til samtyktar um at seta hjúnalagslógina í gildi fyri Føroyar

Ár 1998, hósdagin 5. mars, legdi Jenis av Rana, løgtingsmaður, vegna Miðflokkin fram soljóðandi

Uppskot
til
samtyktar

Vísandi á § 48, stk. 1., nr. 6, í Tingskipan Føroya Løgtings verður heitt á landsstýrið at leggja fyri løgtingið uppskot til ríkislógartilmæli um at seta í gildi fyri Føroyar lóg nr. 256 frá 4. juni 1969 "om ægteskabs indgåelse og opløsning", sum seinast broytt við lóg nr. 396 frá 13. juni 1990.

Viðmerkingar
Høvuðsendamálið við at fáa ajourført lóggávuverkið á hesum økinum er at gera tað gjørligt hjá føroyskum frísamkomuleiðarum at fáa rættindi at gifta fólk.

Galdandi "føroyska" hjúnalagslógin er "ægteskabslov fra 1922", sum í Danmark er verðin avloyst av "ægteskabslov af 4. juni 1969". Eldra lógin heimilar ikki leiðarum í føroyskum frísamkomum at gifta fólk, ein rættur, sum frísamkomuleiðarar í øllum hinum norðurlondum hava.

Sum svar upp á umsóknir um at fáa hendta rætt, vísir danska kirkjumálaráðið á, at so leingi lógin frá 1922 er í gildi, er ikki heimild at geva slík loyvi, meðan ígildisseten av lógini frá 4. juni 1969 (núgaldandi donsku lógini), gevur kirkjumálaráðnum rætt at geva slík loyvi (ægteskabsvielse med borgerlig gyldighed).

Sum orsøk til ynskt um at fáa loyvt at gifta fólk føra leiðarar í føroyskum frísamkomum m.a. fram, at talið av teimum, sum ynskja at verða gift í eini frísamkomu, er alsamt vaksandi, og at hetta elvir til eitt vaksandi trýst á teir fáu politistar, sum vanliga verða bidnir til vígslur í hesum samkomum.

1. viðgerð mánadagin 16. mars 1998. Uppskotið verður beint í nevndina.

Málið fall burtur sbr. stýrisskipanarlógini § 15 stk. 3, tí ar løgtingsval var 30. apríl 1998, og málið ikki var liðugt viðgjørt á tingi fyri valið.

136 Tilmæli um løgtingslógaruppskot um at bøta skattligu viðurskifti hjá hjúnum

Ár 1998, høsdagin 5. mars, legði Tordur J. Niclasen, løgtingsmaður, vegna Miðflokkin fram soljóðandi

U p p s k o t
til
samtyktar

Heitt verður á landsstýrið at fyrireika og leggja fyri løgtingið broytingar í skattalógini soleiðis, at galdandi frá 1. januar 1999 verður skattalógin broytt, so at møguleiki verður hjá hjúnum at flyta part av inntøkuni sínámillum til skattingar.

Viðmerkingar
Miðflokkurin hevur mangan víst á týdningin av einum miðvísum familjuvinarligum politikki og legði í hesum sambandi dentin á at fáa í samgonguskjalið frá 30.08.94, at "hjún ikki skattliga verða fyri vanbýti."

Tað er ein sannroynd, at tað at liva í hjúnabandi nú í nógv ár hevur havt skattligar negativar avleiðingar við sær. Ja, beinleiðis hevur tað loyst seg skattliga ikki at giftast, men heldur at liva saman ógift.

Miðflokkurin hevur áhaldandi víst á hendа skeivleika og undirstrikað, at tað kann ikki vera rætt í einum skipaðum samfelag sum okkara, at lógin skal vera soleiðis háttað, at tað fíggjarliga skal vera ein fyrimunur at liva saman ógift.

Miðflokkurin tekur undir við yvirlýsingini hjá SÍ, har m.a. sagt verður: " *Familjan er tann náttúrligi og grundleggjandi eindarbólkurin og hevur krav uppá verju og stuðul samfelagsins og landsins.*"

Vit ásanna, at familjan er homasteinurin í samfelagnum, og at løggávan má verja heimið - og at hjúnabandið er Gudgivni háttурin fyri samlívi millum mann og kvinnu.

Løggávan eigur tí eisini at stuðla hesi skipan.

Vit í miðflokkinum eru av teirri sannføring, at hevur familjan tað gott, so hevur samfelagið tað eisini gott. Hetta var m.a. orsøkin til, at vit á sínum tíðu lógdu dent á at fáa við í samgonguskjalið frá 30.08.94, at "*hjún ikki skattliga verða fyri vanbýti*" og ***"at arbeitt verður fyri at fremja broytingar í skattalógini við atliti til, at hjúnafelagar í ávísan mun kunnu býta inntøkuna sundur sínámillum..."***

Hetta samgonguskjal var eisini undirskrivað av Sambandsflokkinum og Fólkaflokkinum.

Vit hava tí fleiri ferðir roynt at fáa løgtingið til skattliga at javnseta hjún við bert einari inntøku við onnur húski við tveimum inntøkum. Vit hava skotið upp, at einkarinntøkan verður býtt sundur til skattingar - upp til eina ávísa upphædd í leinnaarbeiðandi hjúnafelagans part.

Vit mugu tíanverri ásanna, at higartil hevur løgtingið ikki viljað betint fyri tí nummanum, sum verandi skattalóg ger móti familjum, har annar hjúnafelagin ynskir at arbeiða heima, men sleppur tað ikki av skattaávum.

Taka vit eitt dømi um skattligu diskrimineringina av hjúnum, har talan er bert um ta einu inntøkuna, í mun til, har sama inntøka er forvunnin av tveimum, ið liva saman ógift, er høskandi at nyta dømi, ið sambands maður førdi fram viðvíkjandi skattligu viðurskiftum hjúna.

Í Dimmalætting 1. november 1996 førdi sambandspolitikkart fram hesi sjónarmið viðvíkjandi skattligum viðurskiftum hjúna, og hvussu roknistykki sá út, har tað almenna rindaði tilskot til barnaansing

	Bæði arbeiða	Maður arbeiðir	Munur
Skattskyldug løn hjá manni	120.000	240.000	
Skattskyldug løn hjá konu	120.000		
Skattskyldug løn tilsamans	240.000	240.000	0
Skattur & ALS fyri mann og konu	67.000	92.600	
Tøk løn til familjuna	173.000	147.400	25.600
Gjald til vøggustovu/barnagarð (Foreldur gjalda 30%)	33.600	0	
Eftir til familjuna tá stovnsplássið er goldið	139.400	147.400	
Skattur til land og kommunu	67.000	92.600	
Tilskot til stovnspláss (30 % Kommuna og 40% Land)	78.400	0	
Eftir til land og kommunu	**-11.400**	**92.600**	**104.000**

Tá so hugsað verður um, hvat tað almenna veitir eini barnafamilju, har bæði foreldrini arbeiða úti, eitt nú barnaansing, - sum kostar hinum almenna uml. 45.000 kr um árið pr. barn á stovni - og at hjún, har annar hjúnafelagin arbeiðir heima, fáa ikki líknandi sømdir og eru fyri fíggjarligum vanbýti av at ansa sínum egnu børnum heima, gerst almenna diskrimineringin móti barnafamiljuni við einari inntøku enn størri.

Vit høvdu tí nú roknað við, at Sambandsflokkurin og Fólkaflokkurin, standi í samgongu, fóru at gera nakað við henda trupulleika, men so er tíðvent ikki. Og tað harmar - og man uttan iva harma mangan familju kring landið.

Fyri góðum tveimum árum síðan samtykti tingið, at landsstýrið skuldi kanna avleiðingarnar av eini skipan, har hjúnafelagar við eini inntøku verða skattaðir hvør sær av helminginum av samlaðu inntøkuni hjá báðum hjúnafeløgunum.

Landsstýrið samtykti so 26. mai 1995 at seta arbeiðsbólk at gera álit um skatting av hjúnafelagum.

Men setningurin, ið nevndin fekk, var ikki tann ítøkiligi, ið løgtingið hevði samtykt, men heldur "at lýsa, hvussu hjúnabandsstøðan ikki skal hava skattligu ávirkan".

Í arbeiðsbólkinum sótu deildarleiðari á Toll- og Skatt, ein advokatur og so forkvinnan í Javnstøðunevndini. Miðflokkurin veit ikki, hvør orsøkin er, at landsstýrið ikki hevur roynt at kunna skattligu diskrimineringini hjá familjuni við einari inntøku til lívs - ella í hvussu so er at minka hesa. Men vit síggja í nevnda álitti frá arbeiðsbólkinum, at tey ikki mæla til slíka skipan og spøkir her aftur fyribrigdið um javnstøðu:

Sagt verður m.a. *"Í veruleikanum merkir reglan ofta, at peningaupphæddin hjá tí hægru inntøkuni verður flutt til hjúnafelagan við tí lægru inntøkuni, soleiðis at marginalskatturin verður lægri. Hesin fyrimunur minkar, um inntøkan hjá tí við tí lægru inntøkuni hækkar..."* og so kemur tað, sum var væntandi, men ikki átti at spent bein fyri eini skipan, sum júst skuldi byggjast á valmøguleikan hjá hjúnum... *"Hetta kann halda hesum hjúnafelagnum burtur frá arbeiðsmarknaðinum vitandi um, at skattingin verður harðari. Ikki heldur er ólíkegt, at hjúnafelagin við tí hægru inntøkuni kann leggja eitt ávist trýst á hjúnafelagan, sum kanska ynskir at økja um inntøku og sjálvstøðu sína t.d. við størri tilknyti til arbeiðsmarknaðin. Klovning er ikki viðvirkandi til javnstøðu hjúnanna ímillum..."*

Ófatuligt, at javnstøðiskórið eftir øllum at dømna, hevur rurað fólkatloksmenn og sambandsmenn í hlund. Uppskot Miðfloksins miðar ímóti at bøta um skattliga mismunin, ið húski við bert tí einu inntøkuni eru fyri, og samstundis at lætta um trýstið á "barnaansingina", arbeiðsmarknaðin, Arbeiðsloysisskipanina og forsorgarhjálpina.

Arbeiðsloysi í Føroyum er framvegis stórt, og tyri fleiri húski er galdandi, at bæði kona og maður hava gingið arbeiðsleys í so langa tíð, at tey antin eru ella verða koyrd úr Arbeiðsloysisskipanini, og er tí bráðneyð ngt, at nakað verður gjørt fyri at fáa í minsta lagi annað teirra aftur í arbeiði.

Við hesum uppskoti kunnu arbeiðspláss gevast leys, um onnur húskt, har bæði kona og maður hava arbeiði, fáa eina motivering fyri, at annað teirra kann velja at gerast heimaarbeiðandi. Hetta kann serliga gera seg galdandi fyri tey, ið hava rímiliga inntøku í løtuni, men hóast tað tkkt fáa endarnar at røkka saman við bert einari inntøku. Við skattabýtinum og t.d. spardu útreiðslunum til barnaansing verður møguligt hjá hesi familju at klára seg við bert tí einu inntøkuni.

Hugsast kann eisini, at hjún, har annað í løtuni fær arbeiðsloysisstuðul og má ganga undir tær treytir, sum eru fyri hesum stuðli, (t.d. hava børnini í røkt fyri at kunna vera tøkur á arbeiðsmarknaðinum), heldur velja skipanina við skattabýtinum fyri at sleppa undan hesum treytum og harvið spara gjøld til dagrøkt o.l. Harvið sparir arbeiðsloysisuyggingin eisini veitingina til tann heimaarbeiðandi.

Landskassin kemur í 1. syftu at fáa minni skattainntøkur av hesum lógaruppskoti - mett verður uml. einar 10 mió kr. Tá verður hugsað um, at samlaða skattskyldiga inntøkan hjá tí, ið inntøkan verður flutt til, í mesta lagi svarar til 70% av hægstu veiting frá Arbeiðsloysisskipanini.

Tað, ið landskassin fær minni í inntøku, merkir, at hin einstaka familjan fær meira at ráða yvir.

Uppá longri sikt er hetta uppskot við til at bøta um býtið av teimum fáu arbeiðsplássum, ið eru, og vil tað samstundis lætta um tað ovurstóra trýst, ið Arbeiðsloysisskipanin knógvar undir.

Sum sagt, hava royndir áður verið gjørdar við uppskoti um at broyta skattalógina soleiðis, at hjúnafelagar við eini inntøku verða skattaðir hvør sær av helminginum av samlaðu inntøkuni hjá báðum hjúnafeløgunum. Hetta uttan at uppskotini hava vunnið frama á løgtingið.

Enn einferð verður so ein roynd gjørd at avmarka skattligu diskriminceringina hjá familjuni við bert tí einu inntøkuni, og partur Miðfloksins skal ikki liggja eftir, tá ræður um at fáa viðtikið eitt hvørt familjuvinaligt uppskot.

1. viðgerð mikudagin 18. mars 1998. Uppskotið varð beint í fíggjarnevndina.

Málið fall burtur sbr. stýrisskipanarlógini § 15 stk. 3, tí at løgtingsval var 30. apríl 1998, og málið ikki var liðugt viðgjørt á tingi fyri valið.

137 Uppskot til samtyktar um fólkaatkvøðu um ríkisrættarligu støðu Føroya

Ár 1998, hósdagin 5. mars, legði Helena Dam á Neystabø, løgtingsmaður, vegna Sjálvstýrisflokkin fram sonce-tjóðandi

U p p s k o t
til
samtyktar

Løgtingið samtykkir at heita á landsstýrið um í ár 2000 og í seinasta lagi ár 2004 at leggja fyri tingið lógaruppskot um fólkaatkvøðu um ríkisrættarligu støðu Føroya.

Viðmerkingar

Sjálvstýrisflokkurin heldur, tað vera uppá tíðina, at vit fara at kanna eftir støðu Føroya fólks til ríkisrættarligu støðu okkara. Flest øll eru samd um, at hon er alt annað enn góð, men kortini kunnu vit ikki semjast um at gera nakað við hana.

Frágreiðingin frá bankakanningarnevndini vísir, at tá ið føroyska samfelagið er í eitari kreppustøðu, valdar stór óvissa um, hvørjar ábyrgdir, skyldur og rættindir Føroyar og Danmark hava mótvegis hvørjum øðrum. Somuleiðis er seinastu tíðina sáddur ivi um, hvønn status heimastýrislógin yvirhøvur hevur.

Tað hava verið ymisk uppskot í løgtinginum um stýrisskipanarligu viðurskifti Føroya, men illa hevur borið til at finna semju.

Í løtunni liggur í løgtinginum uppskot um at seta eina stjórnmálanevnd at kanna stýrisskipanarligu viðurskifti okkara og at seta fram uppskot til eina skipan við størri sjálvræði. Vónandi fer tað at bera til at semjast um, at henda nevnd ger tvey alternativ aftrat, eitt við fullum sjálvstýri og eitt, sum er dagføring av verandi skipan. Henda nevnd skal vera liðug við sítt arbeiði í 1999.

Til tess at tryggja, at arbeiðið hjá einari tílíkari nevnd forpliktar bæði nevndina og ta politisku skipanina, hevur Sjálvstýrisflokkurin longu í fjør boðað frá, at vit fóru at seta fram uppskot um, at løgtingið semist um at leggja spurningin, væl fyrireikaðan, út til fólkið at taka støðu til.

Altavgerandi er, at vit vita, hvat vit skulu atkvøða um. Soleiðis at ikki sami ruðuleiki stendst av einari nýggjari fólkaatkvøðu, sum tað gjørdi í 1946.

Tað vil siga, at veljarin veit, hvat hann atkvøðir um. At ivamál ikki stinga seg upp um, hvat skal henda, tá atkvøðugreiðslan er liðug.

Tjóðveldisflokkurin tvíheldur um fólkaatkvøðuna í 1946. Sjálvstýrisflokkurin heldur, tað vera skeivt at taka møguleikan frá fólkinum í dag, teimum ungu og teimum eldru at siga sína hugsan, við at vísa til fólkaatkvøðuna í 1946.

Vit eiga at sleppa hesum tosinum nú. Tá fólkaatkvøðuna gjørdi danakongur til einkis við vælsignilsi Føroya Løgtings. Burtur úr heimi fingu vit Heimastýrislógina, sum í ár hevur fimti ár á baki.

Tað hevði verið ein virðiligur virði at sett heimastýrislógini, um vit í ár kunnu semjast um eina nýggja fólkaatkvøðu.

Eina fólkaatkvøðu, sum er løgd til rættis soleiðis, at allir spurningar verða væl lýstir. Har talan ikki verður um at manipulera við at biðja fólk um at atkvøða blankt, eitt nei, ella seta aðrar viðmerkingar á atkvøðuseðilin, sum gjørt varð fyri 50 árum síðani.

Vit mugu gera okkum greitt, at tað liggur ein ábyrgd millum okkum og fræslið, tess skjótari vit taka ábyrgdina, tess skjótari vinna vit fræslið.

Til tess at plikta politisku skipanina er tað ásett í uppskotinum til samtykkur, at fólkaatkvøðan skal verða í ár 2000 og í seinasta lagi ár 2004. Verður stýrisskipanarnevndin sett, er hon liðug við arbeiði sítt í 1999, og átti tíðarkarmurin at verið rímiligur. Tá áttu tvey ella try væl fyrireikaði og politisk viðgjørd uppskot at verið klár at lagt út til fólkið at taka støðu til.

Okkum mangla, sum er, fleiri stýringsamboð, m.a. til tess at stýra peningaligu og fíggjarligu viðurskiftum Føroya. Hesi mugu útvegast.

Tað er hugsan Sjálvstýrisfloksins, at ein nýggj skipan eigur at áseta nágreiniligar treytir og avmarkingar í heimildum hjá løgtingi og landsstýri at skuldarbinda samfelagið og fólkið - ikki mínst tey komandi ættarliðini.

Ein nýggj skipan eigur sjálvsagt eisini at bera í sær, at Føroyar sjálvar hava ábyrgd av samskifti og samráðingum við onnur lond.

Hon eigur geitt at definera føroyingar sum eitt fólk við rættindum og ábyrgdum í altjóða høpi.
Hon eigur sum grundarlag at hava eina langtíðarloysn á fíggjarviðurskiftum Føroya og eina langtíðarloysn á fíggjarviðurskiftunum millum Føroyar og Danmark.

1. viðgerð mánadagin 16. mars 1998. Uppskotið varð heint í rættarnevndina.

Málið fall hurtur sbr. stýrisskipanarlógini § 15 stk. 3, tí at løgtingsval var 30. apríl 1998, og málið ikki var liðugt viðgjørt á tingi fyri valið.

138 Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um Føroyska Altjóða Skipaskrá

Ár 1998, hósdagin 5. mars, legði John Petersen, landsstýrismaður, vegna landsstýrið fram soljóðandi

Uppskot
til
løgtingslóg um broyting í løgtiugslóg um Føroyska Altjóða Skipaskrá

§ 1.

Í løgtingslóg nr. 78 frá 10. mars 1992 um Føroyska Altjóða Skipaskrá sum broytt við løgtingslóg nr. 82 frá 13. mai 1992 og við løgtingslóg nr. 62 frá 14. mai 1997 verða gjørdar hesar broytingar:

1) § 1, stk. 1 verður orðað soleiðis:
"Í "Føroysku Altjóða Skipaskránni" verða tikin upp føroysk skip, sum eru 100 tons brutto ella meira".

2) § 1, stk. 2 verður orðað soleiðis:
"Stk. 2. Fyri at eitt skip skal kunna metast sum føroyskt og sigla undir føroyskum flaggi, má eigarin vera føroyskur, jfr. tó ásetingina í § 7, stk. 2. Sum føroyskur eigari verður mettur parta, smápartafelag ella vinnurekandi grunnur, skrásettur í Skráseting Føroya".

3) Í § 1 verður sum nýtt stk. 3 sett:
"Stk. 3. Leiðarin av skipaskráttni kann í serligum

førum loyva teimum eigaraviðurskiftum, sum nevnd eru í § 1, stk. 2 í løgtingslóg nr. 9 frá 5. mars 1970 um skráseting av skipum við seinni broytingum."

4) § 1, stk. 3 verður hereftir stk. 4, og § 1, stk. 4 verður strikað.
5) Í § 10, stk. 3 verða orðini "eigarin er føroyskur, smb. løgtingslóg um skráseting av skipum v.m. § 1, og", strikaði.
6) § 11, nr. 7 verður orðað soleiðis:
"7) at eigarin skal gjalda fyri upptøku í og striking úr skránni, herundir gjald fyri tjóðskaparbrævog gjald fyri veðbrøv og skaðaloysisbrævv.m., og"
7) § 11, nr. 5 verður strikað.
§ 11, nr. 6, 7 og 8 verða hereftir ávikavist nr. 5, 6 og 7.

§ 2.

Henda lógin kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd. Samstundis verður danski teksturin í lógini strikaður.

Viðmerkingar

ad 1) Sambært broytingini verður ikki longur víst til treytirnar í skipaskrásetingarlógini, fyri skráseting av skipi í Føroysku Altjóða Skipaskrá, jfr. tó reglurnar um undantak frá høvuðsregluni um eigaraviðurskifti sí niðanfyri.

ad 2) og ad 3) Sambært broytingini skulu eigarnir av einum skipi skrásetast í Føroysku Altjóða Skipaskrá vera parta-, smápartafelg ella vinnurekandi grunnur, sum er skrásettur í Føroyum.

Sambært partafelagslógini kunnu útlendingar vera eigarir av partapeninginum, tó skulu treytirnar um bústaðarrætt fyri meirlutan av nevndini og stjóran vera loknar. Annars kann verða víst til reglurnar í grein 147 í lóg um filialar í partafelagslógini í Føroyum av útlendskum feløgum. Í slíkum førum er treytin fyri vinnuligum virksemi tann, at hetta er heimilað sambært altjóða sáttmála, ella at serstakt loyvi fyriliggur frá landsstýrinum.

Endamálið við at krevja at parta-, smápartafelag ella vinurekandi grunnur skal standa sum eigari av skipum undir FAS, er at gera skipanina metra greiða og einfalda at umsita. Lóggávuverkið á hesum øki er nevnliga bæði væl útbygt og viðurkent í altjóða høpi.

Hóast hetta verður mett, at tað ikki ber til heilt at bróta gamla siðvenju, tá talan er um onnur eigaraviðurskifti av skipum, Tíðskil verður skotið upp, at gera eina undantaksreglu frá høvuðsregluni í stk. 2, soleiðis at tey í skipaskrásetingarlógini § 1, stk. 2 nevndu eigaraviðurskifti kunnu góðtakast í serligum føri. Undantaksreglan kann nytast um so er, at sakligar grundgevingar verða førdar fram um, at serlig tíggjarlig- ella persónlig viðurskifti gera seg galdandi, sum eru ein beinleiðis forðing fyri at høvuðsreglan kann verða nýtt.

Ognarviðurskiftini, sum nevnd eru omanfyri, forða ikki fyri, at skip, sum eru útlendsk ogn kunnu vera skrásett í Føroyum, men skal hetta tá vera undir bareboatskrásetingini.

ad 4) Ásetingin í hesari grein verður strikað av tí at tilvísingin til skipaskrásetingarlógina í stk. 1 er strikað. Heimild til at víkja frá reglunum um tjóskapartreytir er hervið burtur, vegna tess, at reglurnar í stk. 2 eru strikaðar.

ad 5) Av somu grund sum undir ad. 4, er ásetingin um føroysk eigaraviðurskifti og tilvísingin til skipaskrásetingarlógina fallin burtur.

ad 6) Heimild verður nú eisini fyri at áseta gjald fyri veðbrøv, skaðaloysisbrøv v.m.. Í løtuni verður onki goldið fyri hetta í sambandi við skráseting í skipaskránni.

Ad 7) Reglurnar um tann føroyska ognarpartin í tí útlendska feingnum kunnu strikast, um fyriliggjandi uppskot til broyting av § 1, stk. 2, verður sett í gildi.

Málið fall burtur sbr. stýrisskipanarlógini § 15 stk. 3, tí at løgtingsval var 30. apríl 1998, og málið ikki var liðugt viðgjørt á tingi fyri valið.

F.L.j.nr. 1615-2/91

139 Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um mánaðarligan minstaforvinning til útróðrarmenn

Ár 1998, hósdagin 5. mars, legði John Petersen, landsstýrismaður, vegna landsstýrið fram soljóðandi

Uppskot
til
løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um mánaðarligan minstaforvinning til útróðrarmenn

§ 1.

Í løgtingslóg nr. 166 frá 29. desember 1997 um mánaðarligan minstaforvinning til útróðrarmenn verða gjørdar hesar broytingar:

1) Har orðini "Lønjavningargrunninum og Lønjavningargrunnin" kemur fyri í lógini, verða orðini "Lønjavningarstovuni og Lønjavningarstovuna" sett ístaðin.

2) Í § 2, stk. 2 verður orðingin "Fiskifør undir 15 Brt. 4 menn, millum 15 og 20 Brt 5 menn" broytt til: "Fiskifør undir 20 Brt. 5 menn".

§ 2.

Henda lóg kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

Viðmerkingar

Til 1) Víst verður til løgtingsmál nr. 92 um Lønjavningargrunn. Mælt verður til, at har orðini "Lønjavningargrunninum og Lønjavningargrunnin" kemur fyri í lógini, verða orðini "Lønjavningarstovuni og Lønjavningarstovuna" sett ístaðin.

Ad 2) Broytingin loyvir útróðrarbátum undir 15 Brt at rógva við einum manni meira undir mánaðarligum minstaforvinningi. Óvist er, hvørjar avleiðingar broytingin fær á kostnaðin av skipanini. Ikki er ósannlíkt, at talan verður um eina minni hækking av kostnaðinum.

Kostnaður av broytingini: Óvist - Ikki er ósannlíkt, at við broytingini av § 2, stk. 2 verður talan um eina minni hækking av kostnaðinum.

Málið fall burtur sbr. stýrisskipanarlógini § 15 stk. 3, tí at løgtingsval var 30. apríl 1998, og málið ikki var liðugt viðgjørt á tingi fyri valið.

F.L. j.nr. 1500-24/96

140 Uppskot til løgtingslóg um endurnýgging av feskfiskaflotanum og um umleggingar og javnskipan av veiðuorkuni

Ár 1998, hósdagin 5. mars, legði John Petersen, landsstýrismaður, vegna landsstýrið fram soljóðandi

Uppskot
til
løgtingslóg um endurnýgging av feskfiskaflotanum og um umleggingar og javnskipan av veiðuorkuni

Kapittul 1
Endamál

§ 1. Endamálið við hesi lóg er stuðla undir eini endurnýgging av føroyska feskfiskaflotanum og at stuðla undir eini javnskipan av veiðuorkuni.

Kapittul 2
Stovnsetan av grunni

§ 2. Stovnsettur verður grunnur til at veita stuðul í sambandi við endurnýgging, umlegging og javnskipan av feskfiskaflotanum.

Stk. 2. Stovnsfæ grunsins er játtanin á liggjarløgtingslógini fyri 1998, sum er 40 mió. kr.

Stk. 3. Stovnsfæ grunsins kann verða hækkað við gjøldum, ið eru ásett við heimild í løgtingslóg um vinnuligan fiskiskap og játtanum á seinni fíggjarløgtingslógum.

Stk. 4. Grunnurin er fyrisitingarliga skipaður undir landsstýrismanninum í fiskivinnumálum.

Kapittul 3
Almennar stuðulstreytir

§ 3. Stuðul sambært hesi lóg kann bert verða latin til eigarar av fiskiførum, ið eru umfatað av bólki 1 - 5 í § 28 í løgtingslóg um vinnuligan fiskiskap, tó eru fiskifør undir 15 brt. bert umfatað, um hesir hava veiðuloyvi sum fult riknir útróðrarbátar.

§ 4. Allar stuðulsveitingar eru treytaðar av, at avvarðandi eigari hevur í eginpeningi í minsta lagi 12½ % av virði fiskifarsins. Í sambandi við umbyggingar ella umleggingar verður eginpeningurin roknaður av tí virði, fiskifarið hevur aftaná umbyggingina ella umleggingina.

Stk. 2. Landsstýrismaðurin í fiskivinnumálum ásetur í kunngerð nærri reglur um eginpening.

§ 5. Allur stuðul sambært hesi lóg verður veittur sum eitt rentu- og avdráttarfrítt lán, ið verður niðurskrivað yvir 10 ár. Lánið verður tryggjað best møguliga við veðrætti í avvarðandi fiskifari.

Stk. 2. Skiftir fiskifarið eigara áðrenn lánið er fult niðurskrivað, fellur tann partur, ið er eftir av lánunum, til gjaldingar. Landsstýrismaðurin í fiskivinnumálum kann loyva, at tað, sum er eftir av lánunum, verður standandi í fiskifarinum treytað av, at fiskifarið verður selt í Føroyum.

Stk. 3. Landsstýrismaðurin ásetur í kunngerð reglur fyri afturgjalding av láni til fiskifør undir 15 BRT í teimum føri, har eigari av fiskifari undir 15 BRT gevst at reka vinnuligan fiskiskap, áðrenn lánið er fult niðurskrivað.

Kapittul 4
Stuðul til bygging, umbygging og umlegging til aðra veiðu

§ 6. Til bygging av fiskifari kann veitast upp til 12 % í rentustuðli til persón ella felag. Stuðulin verður veittur av virði fiskifarsins eftir meting.

Stk. 2. Rentustuðulin verður goldin yvir 3 ár við 4 % hvørt árið. Goldið verður hálvárliga, fyrstu ferð ½ ár aftaná at fiskifarið er virðismett, avhendað og skrásett.

§ 7. Til bygging av fiskifari kann veitast upp til 15 % í fløgustuðli til persón ella felag. Fløgustuðulin verður veittur av virðið fiskifarsins eftir meting.

Stk. 2. Harumframt kann veitast upp til 5 % í fiskoytisfløgustuðli til bygging av fiskifari treytað av, at eginpeningur hækkar til 15 %, smb. § 4, stk. 1. Landsstýrismaðurin í fiskivinnumálum ásetur nærri reglur hesum viðvíkjandi.

Stk. 3. Til innflutt fiskifar kann veitast upp til 15 % í fløgustuðli treytað av, at innflutta fiskifarið ikki er eldri enn 5 ár roknað frá skráseting í føroysku skipaskrámt og annað eldri fiskifar fer úr flotanum

ístaðin.
Stk. 4. Landsstýrismaðurin í fiskivinnumálum ásetur nærri reglur um útgjalding eftir hesi grein.

§ 8. Til umbygging av fiskifari í sambandi við størri gagnnýtslu umborð og/ella umlegging til aðra veiðu, kann veitast upp til 15 % í fløgustuðli av kostnaðinum.
Stk. 2. Landsstýrismaðurin í fiskivinnumálum ásetur nærri reglur um veiting av stuðli sambært stk. 1.

Kapittul 5
Stuðul til javnskipan av veiðuorkuni

§ 9. Stuðul kann veitast í sambandi við samanlegging av veiðuloyvum til eitt veiðuloyvi, og at rættindini hjá avvarðandi eigara av fiskifari verða flutt nýggja eigaranum.
Stk. 2. Verður umsókn um samanlegging játtað, verður stuðulin latin á henda hátt:
1) fyri hvørt tonsið, ið fiskifarið hevur veitt í meðal 4 tey bestu áriti av 6 teimum seinastu árunum, verður latið kr. 1.250,-, og
2) fyri hvørt bruttoregistartonsi í málibrævinum hjá fiskifarinum kr. 2.500,-.

§ 10. Fiskifar, sum fær stuðul sambært § 9, missir veiðuloyvið og kann ikki fáa veiðuloyvið aftur.

Kapittul 6
Felags reglur

§ 11. Umsóknir um stuðul skulu sendast Fiskimálastýrinum saman við m.a. ætlanum, ið syna eitt burðardygt raksrargrundarlag.
Stk. 2. Fiskimálastýrið kann frá umsøkjaranum og almennum myndugleikum krevja allar upplýsingar, sum nettar eru neyðugar til at taka avgerð í málinum. Landsstýrismaðurin ásetur í kunngerð nærri reglur um skjalprógv og mannagongdir í sambandi við umsóknir um stuðul.
Stk. 3. Umsøkjarar, ið eru farnir undir bygging, umbygging v.m. uttan frammanundan at vissa sær góðkenning frá Fiskimálastýrinum, kunnu ikki fáa stuðul sambært hesi lóg.

§ 12. Henda lóg kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

Amennar viðmerkingar

Forsøga

Landsstýrið setti hin 16. juli 1996 eina nevnd at kanna og gera tilmæli viðvíkjandi stuðulslóggávuni og fígging annars í sambandi við skipabyggingar. Endurskoðanarnevndin legði fram álit sítt hin 28. mai 1997, og landsstýrismenninir John Petersen og Ivan Johannesen løgdu álitið fyri løgtingið sum løgtingsmál nr. 101/97 vísandi til § 51, stk. 4 í Tingskipan Føroya Løgtings.

Á fíggjarlógini fyri 1998 eru undir § 5 Fiskivinna avsettar 40,0 mió. kr. sum stuðul til fiskiskipaflotan. Í viðmerkingunum til játtanina verður sagt, at landsstýrið fer at leggja nytt lógaruppskot fram í sambandi við at fløgustuðulin til skip dettur burtur í mars 1998. Væntandi verður hert ein partur nyttur í 1998, og verður tí mælt til at leggja peningin í grunn.

Í hesum sambandi kann eisini verða víst á, at tá lógirnar um fløgustuðul komu fyri 5 árum síðani, varð fört fram, at talan var um eina tillagingarskipan fyri feskfiskaflotan ávikavist 3 át fyri tey eldru fiskiførinum og 5 ár fyri tey nýggjaru fiskiførini. Fyri útróðrarflotan skuldi tillagingarskipan vara í 5 ár, tí undirtøka var fyri serliga at stuðla henda partin av flotanum.

Verandi støða í feskfiskaflotanum

Um støðuna í veiðuflotanum verður víst til frágreiðingina frá endurskoðanarnevndini, har sagt verður, at skipini eru ov gomul, serstakliga heimaflotin, og bera seg ikki við verandi fíggingarmøguleikum, veiðumøguleikum og framleiðsluhátti. Sum heild vísa útrokningar, at rakstrarin undir verandi fortreytum megnar ikki at fíggja meir enn umleið 40 % av nyvirðinum av viðkomandi skipi.

Rakstrarúrslitini hjá feskfiskaflotanum eru ikki nóg góð, m.a. orsakað av høgum hyru- og kapitalkostnaði. Hóast tey umleið 100.000 tonsini av botnfiski undan Føroyum hava eitt avreiðingarvirði uppá umleið 700 mió. kr. orsaka av góðum fiskiskapi og við høgum fiskaprísum seinstu 2 árini, og tá við verandi fløgustuðli inni í rakstrinum, so er miðalúrslitið tó so vánaligt, at her fer neyvan nøkur endurnýggjan fram undir verandi skipan.

Útlitini og møguleikar

Landsstýrismaðurin í fiskivinnumálum hevur til fyrireiking av málinum útvega neyðug hagtøl út frá roknskaparúrslitinunum hjá skipunum, og vísir á, at fyri at broyta gongdini nú allur rakstrarstuðul dettur burtur 6. mars 1998 og til tess, at feskfiskaflotin undir Føroyum kann geva eitt avlop uttan rakstrarstuðul mugu skapast fortreytir fyri henda partin av vinnuni at virka undir.

Hesar eru:

1) **Fult umsetilig fiskirættindi**
2) **Liberalisering av virkisøkiunum hjá veiðulíðnum**
3) **Tættari samstarv millum veiðulið, framleiðslulið og sølu**

Í hesum sambandi kann verða nevnt, at landsstýrismaðurin í fiskivinnumálum eisini hevur lagt uppskot fyri tingið um at broyta lógina um vinnuligan fiskiskap, soleiðis at partar av omanfyri nevndu treytum kunnu vera til staðar, samstundis sum hetta lógaruppskotið kann verða samtykt á løgtingið.

Møguleiki er at leggja framleiðsluna um borð, og verður tá størri gangnytsla av fiskasløgunum til ein minni framleiðslukostnað, men eigur at verða tikið við, at framleiðsla um borð sum frysting v.m. hevur við sær broytingar í sáttmálaviðurskiftunum. Fyri partar av flotanum er galdandi, at um veiðan varð virkað meira um borð, hevði tað bøtt um rakstrarúrslitið. Til hetta krevst nyhygging, og umbygging av teimum skipum, sum hava útlit fyri at bera seg.

Stuðul kann eisini verða latin til umbygging í ávísan mun ella sum heild til endurnýggjan av verandi skipaflota við nýggjari innflutt skip.

Samandráttur av lógaruppskotinum

Skipan og treytir

Hóast flestu internu grunnar eru avtiknir, jvb. løgtingslóg nr. 33 frá 27. mars 1992 um avtøku av landskassagrunnum, verður mett neyðugt í hesum sambandi at stovnseta ein grunn, sum stuðul kann verða veittur úr, lutvíst tí tað ikki er gjørligt at siga, hvussu nógv av játtaða peningunum fyri 1998 verður nyttur, og lutvíst tí at møguleikar eiga at vera fyri at hækka stovnsfæi við t.d. gjøldum , ið eru ásett sambært løgtingslóg um vinnuligan fiskiskap og játtanum á seinni fíggjarløgtingslógum. Mælt verður til, at grunnurin verður ein interur grunnur, soleiðis at hesin verður fyrisitingarliga skipaður undir landsstýrismanninum í fiskivinnumálum.

Skotið verður upp, at lógin kemur at fevna um fiskifør, ið eru í bólki 1 - 5 í § 28 í løgtingslóg um vinnuligan fiskiskap. Hetta er eisini tann partur av flotanum, sum áður hevur fingið fløgustuðul sambært løgtingslóg nr. 34 frá 4. mars 1993 um stuðul til feskfiskaflotan við seinni broytingum og sambært løgtingslóg nr. 140 frá 25. mai 1993 um stuðul til útróðrarflotan undir 20 BRT.

Skotið verður eisini upp, at eginpeningskravið verður hækkað, soleiðis at eigarin skal hava í eginpeningi í minsta lagi 12_ % av virði fiskifarsins. Hetta er ein hækking uppá 2_ % í mun til verandi lóggávu. Um ískoytisfløgustuðulin uppá 5 % skal veitast, er hetta tó treytað av, at eginpeningurin hækkar til 15%.

Nýbygging

- Veittur verður ein rentustuðul uppá 12 %, sum verður goldin yvir 3 ár. Hetta svarar áleið til eitt nútíðarvirði (NV) uppá 10 %.
- Ístaðin fyri at veita stuðulslán uppá 10 % og landskassaveðhald upp til 15 %, verður veittur ein generellur fløgustuðul uppá 15 %.
- Veittur verður eisini ein differentieraður ískoytisfløgustuðul uppá 5 % við atliti at eini samfelags búskaparligari optimering og treytað av, at eginfíggingin verður økt við tí endamáli, at rentuberandi skuldin gerst minni.

Umhyggingar og útvegan av nýggjari skipum
Skotið verður upp, at avmarkaður stuðul verður veittur til umbygging av verandi skipum og útvegan av nýggjari innfluttum skipum, tá avmarkað til innflutt skip, sum ikki eru eldri enn 5 ár roknað frá tí at fiskifarið er skrásett í Føroyum. Hetta skal bert galda í teimum førum, tá talan er um at leggja veiðuloyvir saman eftir lógini um vinnuligan fiskiskap, og bert tá tvey veiðuloyvi fara úr fyri eitt, og at broytingin ikki økir um veiðutrystið sum heild og treytað av, at umsøkjarin kann prógva eitt burðardygt rakstrargrundarlag.

Javnskipan av veiðuorku
Øll tey skip og bátar, sum fara úr feskfiskaflotanum í sambandi við samanlegging av veiðuloyvum, verður skotið upp at lata eitt gjald, sum svarar til 25 % av galdandi skipan í lógini um upphøgging av skipum. Um t.d. 2 djúpvatnstrolarar fara úr veiðuflotanum kostar hetta umleið 5 mió. kr. ella í miðal 2,5 mió. kr. fyri hvørt skip. Fyri partrolarar verður upphæddin umleið 2,2 mió. kr. fyri eitt skip og fyri línuskip í miðal umleið 2 mió. kr. fyri eitt skip.

Fíggjarligar og umsitingarligar avleiðingar
Á fíggjarløgtingslógini fyri 1998 eru avsettar 40 mió. kr., og er ætlanin at hesar verða fluttar grunninum. Harumframt kann stovnsfæið í grunninum hækkast við inntøkugjøldum frá feskfiskaflotanum og játtanum á seinni fíggjarlógum. Stuðul til nýbygging krevur tær størstu útreiðslurnar, meðan umbygging og javnskipan av veiðuorku er treytaðar, hvussu nógv skip koma undir reglurnar. Til dømis er kostnaðurin fyri 2 djúpvatnstrolarar og 2 partrolarar 10 mió. kr., um hesir fara úr veiðuflotanum.

Umsitingarliga verður kostnaðurin útreiðslur til eina metingarnevnd sett av landsstýrismanninum í fiskivinnumálum, ið verður bildin innan játtanina til Fiskimálastýrið.

Fiskivinnu Starvsnevndin hevur tann 24. februar 1998 viðgjørt málið, og tekur undir við uppskotinum.

Viðmerkingar til tær einstøku greinarnar
Til § 1.
Endamálið við lógini er at stuðla undir eini endurnýgging av føroyska feskfiskaflotanum og at stuðla undir eini javnskipan av veiðuorkuni.

Til § 2.
Peningurin á fíggjarløgtingslógini fyri 1998, 40 mió. kr., verður settur í ein internan landskassagrunn, sum verður settur á stovn eftir hesum lógaruppskoti. Møguleiki eigur at vera fyri inngjaldingum til grunnin við avgjøldum í tí parti av flotanum, sum er umfatað av lógini, og árligum játtanum á seinni fíggjarlógum.

Til § 3.
Lógin fevnir bert um feskfiskaflotan, tvs. bólkarnar 1 - 5 í § 28 í løgtingslóg um vinnuligan fiskiskap, og sum eisini eru somu fiskifør sum higartil hava verið undir reglunum um íløgustuðul. Lógin fevnir eisini um fiskifør undir 15 brt., tó soleiðis, at bert fult riknir útróðrarbátar eru umfataðir.

Til § 4.
Í verandi lóggávu er minstakravið til eginpening 10 % av virði fiskifarsins, jvb. § 3 í løgtingslóg nr. 102 frá 19.08.1988 um endurnýgging av fiskiskipaflotanum og kunngerð nr. 44 frá 11.05.1989 um eginpening. Skotið verður upp, at kravið um eginpening verður hækkað til 12½ % av virðinum. Um fiskoytisíløgustuðul verður veittur eftir § 7, stk. 2, er hetta tó treytað av, eginpeningurin hækkar til 15 % av virði fiskifarsins.

Til § 5.
Hóast talan er um stuðul, er neyðugt við eini reglu um, at stuðulin verður veittur sum eitt rentu- og avdráttarfrítt lán, ið verður niðurskrivað yvir 10 ár. Um henda regla ikki er við í uppskotinum, er vandi fyri, at ein persónur ella felag, sum byggir eitt fiskifar við mesta stuðli, stutt eftir kann selja fiskifarið av landinum við

vinningi, sum kanska svarar til stuðulin. Verður fiskifar, ið hevur fingið stuðul, selt áðrenn lánið er fult niðurskrivað, fellur restlánið til gjaldingar. Fyri fiskifør undir 15 BRT verður landsstýrismanninum at gera reglur um afturgjalding av lánunum, um so er, at fiskifarið gevst at reka vinnuligan fiskiskap, áðrenn lánið er fult niðurskrivað.

Til §§ 6, 7, 8, 9 og 10.
Kapittul 4 og 5 umfatta tey sløg av stuðulsveitingum, sum kunnu latast úr grunninum, og sum eru:
- *rentustuðul*, sum kann veitast til nýbygging,
- *íløgustuðul*, sum kann veitast til nýbygging, umbygging, umlegging og til innflutt fiskifar, sum ikki er eldri enn 5 ár,
- *ískoytisíløgustuðul*, sum kann veitast til bygging, treytað av, at eginpeningurin hækkar,
- *stuðul til javnskipan av veiðuorkumi*, sum kann veitast til samanleggingur av veiðuloyvum

Fiskifar, sum fær stuðul sambært § 9, missir veiðuloyvið, og kann ikki fáa veiðuloyvið aftur.

Til § 11.
Felags reglur um treytir til umsóknir, og at Fiskimálastýrið kann krevja upplýsingar, sum eru nevndar neyðugar til tess at viðgera eina umsókn.

Til § 12.
Reglur um ígildiskomu.

Málið fall burtur sbr. stýrisskipanarlógini § 15 stk. 3, tí at løgtingsval var 30. apríl 1998, og málið ikki var liðugt viðgjørt á tingi fyri valið.

F.L. j.nr. 1400-23/98

141 Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um stuðul til bygging av fiskiførum á føroyskum skipasmiðjum til útflutnings

Ár 1998, hósdagin 5. mars, legði John Petersen, landsstýrismaður, vegna landsstýrið fram saljóðandi

Uppskot
til
løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um stuðul til bygging av fiskiførum á føroyskum skipasmiðjum til útflutnings

§ 1.
Í løgtingslóg nr. 38 frá 20. mai 1988 um stuðul til bygging av fiskiførum á føroyskum skipasmiðjum til útflutnings, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 83 frá 13. juni 1995 verður gjørd henda broyting:
Í § 5, stk. 2 verður "6 %" broytt til: "12 %".

§ 2.
Henda lóg kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd. Samstundis verður danski teksturin í lógini strikaður.

Viðmerkingar
§ 5, stk. 1 í lógini varð brotið við løgtingslóg nr. 46 frá 8. mars 1994, soleiðis at landsstýrinum varð heimilað at veita upp til 12% í rentustudningi til felag, ið byggir fiskiskip á føroyskari skipasmiðju.

Mett verður tí eisini rættast, at § 5, stk. 2 verður samsvarandi, tí at treytin fyri at veita studning í sambandi við umbygging er, at umbyggingarvirðið er 8 mió. kr. ella meira. Ein slík umbygging vil tí í flestu førum í kostnaði verða at javnmeta við bygging.

Fíggjarligar avleiðingar:

Mett verður ikki, at uppskotið hevur størri útreiðslur við sær, sæð í mun til tað upphæddd, sum í dag er avsett á fíggjarlógini.

Málið fall burtur sbr. stýrisskipanarlógini § 15 stk. 3, tí at løgtingsval var 30. apríl 1998, og málið ikki var liðugt viðgjørt á tingi fyri valið.

F.L.j.nr. 1400-8/91

142 Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um vinnuligan fiskiskap

Ár 1998, hósdagin 5. mars, legði John Petersen, landsstýrismaður, vegna landsstýrið fram soljóðandi

Uppskot
til
løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um vinnuligan fiskiskap

§ 1.

Í løgtingslóg nr. 28 frá 10. mars 1994 um vinnuligan fiskiskap við seinni broytingum verða gjørdar hesar broytingar:

1) § 2, stk. 4 verður orðað soleiðis :
"*Stk. 4.* Skipanarnevndin verður sett av landsstýrismanninum í fiskivinnumálum við umboðum frá vinnuni, Fiskirannsóknarstovuni, Fiskiveiðueftirlitinum og Fiskimálastýrinum. Landsstýrismaðurin í fiskivinnumálum leggur stovnsmetingarnar og tilmælini frá Stovnsrøktarnevndini og Fiskirannsóknarstovuni fyri Skipanarnevndina. Nevndin verður vald fyri 4 ár í senn, og ger landsstýrismaðurin í fiskivinnumálum reglugerð um val og virki nevndarinnar."
2) § 5, stk. 5 verður orðað soleiðis :
"*Stk. 5.* Ein fiskidagur er eitt samdøgur, ið verður roknað, sum landsstýrismaðurin í fiskivinnumálum ásetir. Talið av fiskidøgum, ið eitt fiskifar hevur nytt ein túr, verður roknað frá tí, at túrur byrjar til túrur endar. Tað ber einans til at rokna við heilum fiskidøgum."
3) § 5, stk. 9 verður orðað soleiðis :
"Stk. 9. Stovnsrøktarnevndin. Landsstýrismaðurin í fiskivinnumálum velur eina Stovnsrøktarnevnd, sum letur landsstýrismanninum í fiskivinnumálum metingar av botnfiskastovnunum og tilmæli viðvíkjandi fiskiskapinum eftir botnfiski á føroysku landleiðunum. Eftir uppskoti frá fiskiveiðufeløgunum umboðandi ávikavist hák og trol velur landsstýrismaðurin í fiskivinnumálum tveir limir fyri hvønn bólkin umframt tiltakslimir í nevndina. Nevndin verður vald fyri 4 ár í senn. Landsstýrismaðurin í fiskivinnumálum ger reglugerð um val og virki nevndarinnar og tryggjar nevndini neyðugt tilfar at útinna arbeiðssetningin. Fiskimálastýrið setur skrivara."
4) § 5, stk. 10 verður orðað soleiðis :
"Stk. 10. Fiskiveiðieftirlitið er fyrisitingarliga skipað undir landsstýrismanninum í fiskivinnumálum og fremur eftirlit sum fyriskrivað í hesi lóg."
5) § 5, stk. 11 verður orðað soleiðis :

"Stk. 11. Fiskirannsóknarstovan er fyrisitingarliga skipað undir landsstýrismanninum í fiskivinnumálum og letur landsstýrismanninum í fiskivinnumálum upplýsingar viðvíkjandi støðuni í fiskastovnunum og vísundarligar tilráðingar og metingar samsvarandi endamálinum í hesi lóg."

6) § 8 verður orðað soleiðis :

"§ 8. Veiðuloyvi frá fiskifari, ið er lagt uppá alla, har ræðisavmarking er skrásett í skipaskránni, ella farið er strikað í skipaskránni, kann verða flutt til annað fiskifar uttan veiðuloyvi við somu ella minni fiskiorku ella til innflutt fiskifar við somu ella minni fiskiorku. Er talan um veiðuloyvi til uppsjóvar fiskasløg, rækjuveiðu ella til fiskiskap uttan fyri føroysku landleiðirnar, kann landsstýrismaðurin í fiskivinnumálum gera undantøk frá hesum kravi.

Stk. 2. Verður fiskifar við veiðuloyvi lagt uppá alla, er ræðisavmarking skrásett í skipaskránni, ella farið verður strikað í skipaskránni, kann landsstýrismaðurin í fiskivinnumálum eftir umsókn veita eigaranum tilsøgn um, at veiðuloyvið kann verða flutt til annað fiskifar við veiðuloyvi. Landsstýrismanninum í fiskivinnumálum verður heimilað at lata eigaranum av fiskifarinum, sum veiðuloyvið verður flutt á, at njóta rættindi svarandi til, at fiskiorkan ikki verður støtri enn fiskiorkan tilsamans hjá fiskifarinum framman undan og fiskifarinum, sum veiðuloyvi verður flutt frá.

Stk. 3. Verða veiðuloyvi frá tveimum ella fleiri fiskiførum, ið eru løgd uppá alla, har ræðisavmarking er skrásett í skipaskránni, ella førini eru strikað í skipaskránni, kann landsstýrismaðurin í fiskivinnumálum eftir umsókn veita eigarunum tilsøgn um, at veiðuloyvini kunnu verða flutt til annað fiskifar uttan veiðuloyvi ella til innflutt fiskifar. Landsstýrismanninum í fiskivinnumálum verður heimilað at lata eigaranum av fiskifarinum, sum veiðuloyvini verða flutt á, at njóta rættindi svarandi til, at fiskiorkan ikki verður støtri enn fiskiorkan tilsamans hjá fiskiførunum, sum veiðuloyvini verða flutt frá.

Stk. 4. Verður fiskifar við veiðuloyvi lagt uppá alla, er ræðisavmarking skrásett í skipaskránni, ella farið verður strikað í skipaskránni, kann landsstýrismaðurin í fiskivinnumálum eftir umsókn veita eigaranum tilsøgn um veiðuloyvi til annað fiskifar fstaðin, sum skal verða skrásett í skipaskránni innan 2 ár frá tí degi, at tilsøgnin er givin. Fiskifarið, sum kemur fstaðin, skal lúka treytirnar í stk. 1 viðvíkjandi fiskiorku.

Stk. 5. Landsstýrismanninum í fiskivinnumálum verður givin heimild til í serligum førum at víkja frá 2 ára tíðarfreistini sum ásett í stk. 4.

Stk. 6. Persóni ella felag, sum hevur tilsøgn sambært stk. 4, kann verða latin rættindi samsvarandi § 5, stk. 4-8 í tíðarskeiðnum, sum tilsøgnin er galdandi fyri. Rættindi skulu verða áteknað í fiskiloyvið vísandi til heimildina, sum tey eru veitt eftir. Landsstýrismaðurin í fiskivinnumálum kann eftir umsókn veita persóni ella felag við tilsøgn um veiðuloyvi sambært stk. 4 tilsøgn um, at veiðuloyvið kann verða flutt til annað fiskifar samsvarandi stk. 2 og 3.

Stk. 7. Landsstýrismanninum í fiskivinnumálum verður givin heimild at áseta nærri reglur um, hvussu metingar verða gjørdar viðvíkjandi fiskiorku og viðvíkjandi mannagongdum fyri umsitling av stk. 1-5."

7) § 9, stk. 1, nr. 3 verður orðað soleiðis :

"3) Fiskidagaskipan ella kvotuskipan, har hesi ikki eru býtt út til ávísar skipabólkar eftir hesi lóg."

8) § 9a, stk. 1, litra i) verður orðað soleiðis:

"i) Í tíðarskeiðinum frá 1. januar til 31. desember báðir dagar íroknaðir, millum 12 og 19 fjórðingar frá grundlinjunum millum 315° rættvísandi úr Barðinum (62°08'48"N 07°26'00"V) og innan fyri linjur drignar millum hesi støð og í hesi ráðfylgju:

1. 62°30'00"N 07°45'00"V
2. 62°30'00"N 07°30'00"V
3. 62°26'05"N 07°30'00"V

fyri fiskifør við maskinorku uppá 500 HK ella yvir. Partrol ella dupultrol er ikki loyvt."

9) § 9a, stk. 1, litra j) verður orðað soleiðis:

"j) Í tíðarskeiðinum frá 1. januar til 31. desember báðir dagar íroknaðir, millum 12 og 16 fjórðingar frá grundlinjunum og millum longdarstigið 06°30'00"V og breiddarstigið 62°25'00"N fyri fiskifør við maskinorku uppá 500 HK ella yvir. Partrol ella dupultrol er ikki loyvt."

10) § 10, stk. 1 verður orðað soleiðis :

"Virking av veiðu umborð á fiskiførum undir føroyskum flaggi á føroysku landleiðunum er bert loyvd eftir góðkenning frá landsstýrismanninum í fiskivinnumálum. Virking umborð er, tá fiskurin er meiri viðgjørdur enn sløgdur ella avhøvdaður, sama hvussu hann er goymdur."

11) § 11 verður orðað soleiðis :

"§ 11. Fiskifør undir føroyskum flaggi kunnu ikki fara til vinnuligan fiskiskap uttan at hava veiðuloyvi og fiskiloyvi sambæn § 5, stk. 3 og

4, ella uttan at eigarar tess hava fingið fiskiloyvi til fyribils ella avmarkað rættindi sambært § 5, stk. 4. Landsstýrismanninum í fiskivinnumálum er heimilað í fiskiloyvinum at seta nærri treytir viðvíkjandi t.d. fiskiskapinum og regluligum frábodanum til Fiskiveiðueftirlitið.

Stk. 2. Til vinnuligan fiskiskap við fiskiførum undir føroyskum flaggi eftir fiskasløgum, ið kunna undir fiskidagaskipan, kvotu- ella aðra skipan krevst ræði yvir fiskidøgum ella kvotum, sambært § 5, stk. 5-8.

Stk. 3. Strikað.

Stk. 4. Fiskifør undir fremmandum flaggi kunnu bert veiða á føroysku landleiðunum við loyvi frá Fiskimálastýrinum, sambært sínámillum fiskiveiðuavtalur."

12) § 12 verður orðað soleiðis :

"**§ 12.** Bert persónar og feløg, ið eiga fiskifør, ið hava veiðuloyvi sambært § 5, stk. 3, kunnu fáa rættindi sambært § 5, stk. 4-8. Eigari av fiskifari, ið hevur fingið fiskiloyvi til fyribils ella avmarkað rættindi sambært § 5, stk. 4, kann fáa rættindi sambært § 5, stk. 5-8."

13) § 13 verður orðað soleiðis :

"**§ 13.** Fyri eigarar av fiskiførum við veiðuloyvi sambært § 5, stk. 3, 1. punktum hevur rætturin til fiskidagar, egnan kvotupart og egna hjáveiðukvotu gildi í 10 ár ísenn.

Stk. 2. Fyri eigarar av fiskiførum við veiðuloyvi sambært § 5, stk. 3, 2. punktum eru rættindini teir ásettu fiskidagar, sum eigarin sambært fiskiloyvi til eina og hvørja tíð ræður yvir.

Stk. 3. Landsstýrismaðurin í fiskivinnumálum kann taka avgerð um, at rættur til egna hjáveiðukvotu kann verða latin fiskiførum í høvuðsbólki 1 sambært § 28, stk. 1 við gildi í 10 ár í senn.

Stk. 4. Eigari av fiskifari, ið hevur fingið fiskiloyvi til fyribils ella avmarkað rættindi sambært § 5, stk. 4, fær tó bert tey í fiskiloyvinum fyribils ella avmarkaðu rættindini tað ávísa fiskiárið.

Stk. 5. Treyt fyri at njóta rættindini sambært stk. 1-3 er, at treytirnar í § 8, stk. 6 ella treytirnar í § 12, 1. punktum eru loknar."

14) § 14 verður orðað soleiðis :

"**§ 14.** Fiskidagar kunnu umsetast upp til 10 ár í senn innanfyri hvørm undirbólk ásettir sambært § 29, stk. 1 eftir nærri reglum, sum landsstýrismaðurin í fiskivinnumálum ásetir. Umsetingin er treytað av, at partarnir lúka treytirnar ásettar í § 13.

Stk. 2. Leigaðir fiskidagar falla aftur til upprunaliga rættindahavaran aftan á leigumálið, treytað av, at hann lýkur treytirnar ásettar í § 12. Lykur hann ikki hesa treyt, verða fiskidagarnir býttir javnt millum fiskiførini í viðkomandi undirbólki sambært § 29, stk. 2. Fiskirættindi svarandi til seldar fiskidagar verða løgd aftur at rættindunum hjá fiskiloyvinum, hvørs eigari hevur keypt rættindini.

Stk. 3. Fiskidagar kunnu verða lærdir ella leigaðir í sama fiskiári millum høvuðsbólkarnar ásettir sambært § 28, stk. 1, undantikið frá bólki 5 til hinar bólkarnar, tá 3 mánaðir eru eftir av fiskiárinum eftir nærri reglum, sum landsstýrismaðurin í fiskivinnumálum ásetur. Fiskidagar í høvuðsbólki 4, smb. § 28, stk. 1, kunnu ikki latast frá húki til trol.

Stk. 4. Fiskiveiðieftirlitið skal hava frábodan um flyting av fiskidøgum, áðrenn farið verður at brúka fluttu dagarnar. Frábodanin skal gerast skrivliga og skal verða váttað av báðum pørtum. Fiskidagar kunnu ikki setast í veð.

Stk. 5. Hjá feløgum og einstaklingum, sum hava útvegað sær fiskidagar innan 1. september 1997, verður 10 ára skeiðið roknað frá hesum degi.

Stk. 6. Fiskidagar, sum eru umsettir í einum fiskiári fyri ávíst tíðarskeið, skulu fylgja vøkstri og niðurskurði í sama mun, sum ásetingin í § 29 fyri hvørt fiskiár broytist."

15) § 15 verður orðað soleiðis :

"**§ 15.** Egin kvotupartur, egin árskvota og egin hjáveiðukvota kann umsetast upp til 10 ár í senn eftir nærri reglum, sum landsstýrismaðurin í fiskivinnumálum ásetir. Umsetingin er treytað av, at partarnir lúka treytirnar ásettar í § 13.

Stk. 2. Leigaður egin kvotupartur, egin árskvota ella egin hjáveiðukvota falla aftur til upprunaliga rættindahavaran aftan á leigumálið, treytað av at hann lýkur treytirnar, ásettar í § 12. Lykur hann ikki hesa treyt, verður egin kvotupartur, egin árskvota ella egin hjáveiðukvota býtt javnt millum fiskiførini í viðkomandi undirbólki sambært § 29, stk. 2. Fiskirættindi svarandi til seldar egnar kvotupartar, egnn árskvota ella egnu hjáveiðukvotu verða løgd aftur at rættindunum hjá fiskiloyvinum, hvørs eigari hevur keypt.

Stk. 3. Fiskiveiðieftirlitið skal hava frábodan um umseting av egnum kvotuparti, egnari árskvotu og egnari hjáveiðukvotu, áðrenn farið verður at brúka hesar. Frábodanin skal gerast skrivliga og skal verða váttað av báðum pørtum. Egin kvotupartur, egin árskvota og egin hjáveiðukvota kunnu ikki setast í veð.

Stk. 4. Fyri egnar kvotupartar og egnar árskvotur

umsettar innan 1. september 1997, er reglan í § 14, stk. 2 galdandi.

Stk. 5. Egin kvotupartur og partur í felagskvotu, sum er umsettur í einum fiskiári fyri ávist tíðarskeið, skal fylgja vøkstri ella niðurskurði í sama mun, sum felags árskvotan broytist hvørt ár."

16) § 21, stk. 1 verður orðað soleiðis :

"Veiða úr stovnum, ið ikki koma undir kvotu- ella fiskidagaskipan ella skipan við serligum fiskiloyvi, er loyvd fiskiførum við veiðuloyvi og fiskiloyvi sambært § 5, stk. 3 og 4 ella fiskiførum, hvørs eigarar hava fingið fiskiloyvi til fyribils ella avmarkað rættindi sambært § 5, stk. 4. Fiskiskapurin skal fara fram eftir teimum reglum, ið eru ásettar av landsstýrismanninum í fiskivinnumálum sambært § 9."

17) § 22 verður orðað soleiðis :

"**§ 22.** Við løgtingslóg verður ásett fiskidagatal fyri botnfiskaveiðu á føroyska landgrunninum hvørt fiskiárið.

Stk. 2. Á hvørjum ári fyri 15. juni skal Fiskirannsóknarstovan lata landsstýrismanninum í fiskivinnumálum stovnsmetingar og tilmæli viðvíkjandi fiskiskapinum í føroyskum sjógvi komandi fiskiárið.

Stk. 3. Á hvørjum ári fyri 15. juni skal Stovnsrøktarnevndin lata landsstýrismanninum í fiskivinnumálum eina grundaða meting og eitt tilmæli viðvíkjandi fiskiskapinum eftir botnfiski á føroyska landleiðunum komandi fiskiárið.

Stk. 4. Á hvørjum ári fyri 15. juli skal Skipanarnevndin, grundað á eina mest hóskandi veiðu fyri fiskiárið, lata landsstýrismanninum í fiskivinnumálum tilmæli um, hvussu fiskiskapurin skal skipast tað komandi fiskiárið, her undir møguligar broytingar í fiskidagatalinum fyri hvønn høvuðsbólk. Broytingar í fiskidagatalinum skulu m.a. verða grundaðar á metingar um, hvat fiskidagatal fyri hvønn høvuðsbólk av fiskiførum best tryggjar, at fiskastovnarnir verða gagnnýttir burðardygt. Skipanarnevndin skal meta, um galdandi fyriskipanir fyri fiskiveiðu í føroyskum sjógvi yvirhøvur tryggja, at endamálini við hesi lóg verða rokkin.

Stk. 5. Eru Fiskirannsóknarstovan og Stovnsrøktarnevndin samd um, at lívfrøðiligu fortreytirnar og veiðutrýstið, sum vóru galdandi, seinast fiskidagar vórðu ásettir, eru munandi broyttar, skal Skipanarnevndin út frá hesum gera nýtt tilmæli um fiskidagar.

Stk. 6. Landsstýrismaðurin í fiskivinnumálum leggur uppskot fram til løgtingslóg smb. stk. 1, og gevur í viðmerkingunum til uppskotið frágreiðing við øllum upplýsingum av týdningi viðvíkjandi ásetingini av fiskidøgum.

Stk. 7. Fiskiárið byrjar 1. september og endar 31. august árið eftir. Fiskidagar fyri komandi árið verða ásettir í seinasta lagi 18. august sama árið, fiskiárið byrjar."

18) § 26 verður orðað soleiðis :

"**§ 26.** Veiðumøgdirnar, sum fiskifør undir føroyskum flaggi kunnu veiða uttanfyri føroysku landleiðirnar, verða ásettar fyri eitt ár í senn, sambært sínámillum fiskivinnuavtalum við onnur lond og samjunir í millumlanda og altjóða fiskivinnunevndum. Landsstýrismaðurin í fiskivinnumálum kann luta hesar møgdir út sum egnar kvotupartar, egnar árskvotur ella felags árskvotur. Har fiskirættindini eru ásett sum fiskidagar, kann landsstýrismaðurin í fiskivinnumálum lata fiskifør fiska av ásetta dagatalinum undir einum ella lutað dagarnar millum skipini. Egnir kvotupartar, egnar árskvotur og felags árskvotur koma undir reglurnar í kapittul 3.

Stk. 2. Reglur og treytir fyri fiskiskapi eru tær, sum eru galdandi í fiskivinnuøkinum hjá teimum londum, sínámillum fiskivinnuavtala er gjørd við. Í altjóðasjógvi galda tær reglur, sum avtalaðar eru í millumlanda og altjóða fiskivinnunevndum.

Stk. 3. Landsstýrismaðurin í fiskivinnumálum boðar á hvørjum ári, áðrenn nýggja fiskiárið, galdandi fyri veiðu uttan fyri 200 fjórðinga, byrjar, eigarum av fiskiførum, sum hava veiðuloyvi í frammandum sjógvi, frá veiðurættindum teirra, og tilskilar, á hvørjum leiðum og úr hvørjum stovnum frítt er at veiða.

Stk. 4. Landsstýrismanninum í fiskivinnumálum verður heimilað, tá fyra mánaðir eru eftir av fiskiárinum, at flyta ikki nýttar partar av felags árskvotu hjá einum skipabólki til annan bólk, sum tørvar hesar, grundað á tilfarlingina í hesi lóg.

Stk. 5. Fiskiár í hesum kapittli er tað tíðarskeið, sum felags árskvotan er galdandi fyri."

19) § 29, stk. 3 verður orðað soleiðis :

"*Stk. 3.* Ásetta fiskidagatalið fyri hvønn skipabólk sær er galdandi fyri fiskiskap á innaru fiskidagaleiðini. Landsstýrismaðurin í fiskivinnumálum ásetir nærri reglur um umbýtið av fiskidøgum frá innaru fiskidagaleiðini til ytru fiskidagaleiðina. Verður fiskað á ytru fiskidagaleiðini

uttan fráboðan til Fiskiveiðueftirlitið um umhýti av døgum framman undan, verða dagarnir roknaðir av fiskidagtalinum tillutað til fiskiskap á innaru fiskidagaleið."

20) § 29, stk. 4 verður orðað soleiðis :
"*Stk. 4.* Landsstýrismanninum í fiskivinnumálum verður heimilað í kunngerð at gera reglur fyri, at fiskidagatalið tillutað hvørjum fiskifari í høvuðsbólki 4 kann roknast um í hutfallinum 1:2, um fiskað verður við snellu. Fiskidagatalið fyri høvuðsbólk 5 verður nytt sambært áseting frá landsstýrismanninum í fiskivinnumálum fyri eitt hálvár í senn."

21) § 33, stk. 1 og stk. 2 verður orðað soleiðis :
"Fiskiveiðueftirlitið fyrisitur fiskiveiðueftirlit á sjógvi og landi sambært hesi lóg. Landsstýrismaðurin í fiskivinnumálum ásetir nærri reglur um fiskiveiðueftirlit og um skipan av fiskiveiðueftirlitinum, herundir um eygleiðaraskipan.
Stk. 2. Eftirlitið á sjónum við hesi lóg útinnir fiskiveiðieftirlitið á sjónum. Fiskiveiðieftirlitið á sjónum er samansett av skipum frá Fiskiveiðueftirlitinum og flogførum og eftirlitsskipum frá donsku sjóverjuni. Samstarvið millum Fiskiveiðieftirlitið og donsku sjóverjuna verður útint eftir samstarvsavtalu."

22) § 40, stk. 1, nr. 3 verður orðað soleiðis :
"3) brytur reglurnar í §§ 7, 8, 14 og 15 og 11, § 18, stk. 2, § 19, § 21, stk. 1, 1. punktum, § 24, stk. 2 , § 35a, § 35b og reglur ásettar við heimild í § 21 annars."

23) § 42, stk. 2 verður orðað soleiðis :
"*Stk. 2.* Fyri brot á reglurnar um útblaking og brot á reglurnar um at veiða á stongdari leið ella á friðaðum øki, veiða við ólógligum reiðskapi, veiða uttan veiði- ella fiskiloyvi ella veiða útum ásettari felags árskvotu, egnari árskvotu, loyvdum fiskidøgum sambært fiskiloyvi, egnari hjáveiðukvotu ella loyvduri hjáveiðu sambært kunngerð kann øll veiða og reiðskapur verða inndrigið, herundir net, lemmar, sleiðitrossar, línur, uppstandarar v.m. Ikamikið hvørs ogn hetta er."

24) § 45, stk. 1 og 2 verða orðað soleiðis :
"Fiskiveiðueftirlitið kann beinanvegin taka inn fiskiloyvi, um skiparin á fiskifarinum er skuldsettur fyri brot á reglurnar í § 9, § 9a, § 10, § 18, um fiskifar hevur fiskað meir enn tí er loyvt sambært fiskiloyvi ella reglum, ásettar við kunngerð um fiskiskap á og uttanfyri Føroysku landleiðirnar ella um fiskifarið ikki hevur hildið seg til treytir, ásettar í fiskiloyvinum. Fiskiloyvið kann verða tikið aftur upp til 2 vikur hvørja ferð. Hevur fiskifar fiskað meir enn tí er loyvt sambært fiskiloyvi, verður givið eigaranum tríggjar dagar freist at boða Fiskiveiðueftirlitinum frá, at hann við umsiting av fiskidøgum, egnari árskvotu ella egnari hjáveiðukvotu hevur lokið treytirnar. Landsstýrismaðurin í fiskivinnumálum kann burtfirat mótrokna nøgdina av metta veiðuni, sum blakað er út aftur, í egnari árskvotu ella felags árskvotu.
Stk. 2. Landsstýrismaðurin í fiskivinnumálum kann taka aftur veiði- og fiskiloyvi fyri ávíst tíðarskeið, um skiparin á fiskifarinum er dømdur ella hevur góðtikið bót fyri brot á hesa lóg ella reglur, ásettar við heimild í lógini. Fiskiveiðueftirlitið kann beinanvegin taka aftur fiskiloyvið, um brot verða staðfest á reglurnar um vernd av ungfiski, ásettar sambært § 9. Fiskiloyvið kann verða tikið aftur upp til 3 vikur hvørja ferð."

25) Í § 5, stk. 3 og 4 og í § 48 verða orðini "Føroya Landsstýri" broytt til: "landsstýrismaðurin í fiskivinnumálum".

26) Í § 9, stk. 4, § 16, § 19, § 20, stk. 2 og 3, § 25, § 32, stk. 1, 2 og 3, § 36, § 45, stk. 2 verður orðið "Landsstýrið" broytt til: "Landsstýrismaðurin í fiskivinnumálum".

27) Í § 9, stk. 1, 2 og 3, § 10, stk. 6, § 29, stk. 5 og 9, § 38 verður orðið "Landsstýrinum" broytt til: "Landsstýrismanninum í fiskivinnumálum".

28) Í § 17, § 20, stk. 2 og § 47 verður orðið "landsstýrinum" broytt til: "landsstýrismanninum í fiskivinnumálum".

29) Í § 24, stk. 2 verður orðið "landsstýrinum" broytt til: "Fiskimálastýrinum".

30) Í § 5, stk. 6, 7 og 8, § 9, stk. 1, § 9a, stk. 2, § 17, § 18, stk. 3, § 21, stk. 2, § 23, stk. 1 og 2, § 29, stk. 2 og 6, § 34, stk. 2, § 46, stk. 1, § 48, verður orðið "landsstýrið" broytt til: "landsstýrismaðurin í fiskivinnumálum"

31) Í § 10, stk. 2 og 3 verða orðini "við landsstýrsins loyvi" broytt til: "við loyvi frá landsstýrismanninum í fiskivinnumálum".

32) Í § 34, stk. 2, § 35a, § 35b, stk. 2 og § 36 verður orðið "fiskiveiðueftirlitinum" broytt til: "Fiskiveiðueftirlitinum".

33) Í § 34, stk. 2, § 35b, stk. 3 og § 36 verður orðið "fiskiveiðueftirlitið" broytt til: "Fiskiveiðueftirlitið".

§ 2.

Henda lóg kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

Viðmerkingar
Ein týðandi partur av treytunum, ið partarnir innan fiskiveiðuna virka undir, eru tey rættindi, sum fiskifør og tess eigarar hava. Eru hesi viðurskifti ikki greið, elvir tað til óvissu og kann gera, at avgerðir verða tiknar á skeivum grundarlagi. Hesum eigur at verða fyrðað fyri við greiðum lógarreglum. Meginreglan fyri hesar lógarreglur eigur at vera at leggja viðurskiftini til rættis hjá fiskivinnuni at tryggja sær eitt trygt vinnugrundarlag.

Fiskiveiðutøkniin verður mett støðugt - ein fiskidagur í ár er ikki eins effektivur sum ein fiskidagur verður um 5 ár. Um veiðuttystið ikki skal økjast samsvarandi tí tøkniligu menningini, verður innan fyri verandi fiskidagaskipan neyðugt at minka um feskfiskaflotan, so hvørt sum hann verður tøkniligari betur fyri at fiska. Hetta merkir í stuttum, at fiskidagatalið skal minka. Er talið av fiskiførum óbroytt, og øll skulu hava eins nógvar dagar, verða færri dagar í part. Hetta tekur vinnugrundarlagið undir øllum flotanum. Tí er neyðugt at skapa fortreytirnar, so at føroyska fiskivinnan ikki verður fyri eini slíkari gongd. Hetta skal ikki verða gjørt við at fyrða tøkniligu menningini - tað tekur kappingarførið undan vinnuni - men heldur við at laga tað soleiðis, at fiskirættindi undir greiðum reglum kunnu verða flutt ella umsett millum fiskiførini.
Lógaruppsoktið, sum her verður lagt fram fyri Føroya løgting, miðar ímóti at skapa greiðar karmar fyri, hvørji rættindi, sum teir einstøku partarnir í fiskiveiðuni hava, og hvussu hesi kunnu verða gagnnytt av rættindahavarunum. Hetta snýr seg bæði um, hvussu veiðuloyvi saman við fiskiloyvum kunnu leggjast saman, og hvussu fiskirættindi ásett í fiskiloyvum (egnar kvotur og fiskidagar) kunnu verða umsett innan vinnuna.

Fiskirættindi
Í § 3, stk. 2 í lógini um vinnuligan fiskiskap verður ásett, at fiskirættindi veita ikki einstøkum bólkum ella einstaklingum ognarrætt. Tí verður altíð talan um rættindi fyri eitt avmarkað áramál. Veiðuloyvi til fiskifør 15 BRT og størri verða latin uttan tíðaravmarking, men teimum undir 15 BRT verður fatið veiðuloyvi fyri í upp til 5 ár. Í løgtingsmáli nr. 78/1996 verður greitt frá, hví skilnaður er gjørdur í treytunum.

Landsstýrið hevur áður skotið upp, at lata fiskirættindini verða umsetilig uttan avmarkingar, men løgtingið hevur ásett eitt 10 ára mark. Samsvarandi hesum verður skotið upp, at fiskirættindini í fiskiloyvunum verða latin við gildi fyri 10 ár, tó ongantíð fyri longri enn tað áramál, sum veiðuloyvi hevur gildi.

Umseting
Verandi reglur fyri umseting eru ógreiðar. Eftir landsstýrsins tykki eru orðingarnar í § 14 og 15, har sagt verður "frá tí degi teir/tær seinast vóru umsettir/umsettar" eru ógreiðar. Fyri at gera reglurnar greiðari, verður skotið upp at broyta orðingarnar, so at fiskidagar og kvotur kunnu verða umsett í upp til 10 ár í senn. Bæði leigað og søla verða umfatað av hugtakinum "umseting". Greiður skilnaður verður gjørdur millum leigu og sølu. Við sølu verða rættindini endaliga avhenda keypara, men við leigu fella tey aftur á upprunaeigaran, um hann hevur fiskfar við veiðuloyvi, tá leigumálið er úti. Hevur hann ikki tað, verða fiskirættindini býtt javnt millum hini fiskiførini í samsvarandi skipabólki.

Samanlegging
Umframt møguleikar fyri umseting av fiskirættindum verður skotið upp, at tað skal bera til at kasta rættindini saman í eitt fiskifar til tess at hava betri vinnugrundarlag. Talan kann vera um :

- at flyta veiðuloyvi frá einum fiskifari á eitt annað, sum er í flotanum frammanundan (§ 8, stk. 2),
- at flyta veiðuloyvi frá tveimum ella fleiri fiskiførum á eitt fiskifar uttan veiðuloyvi ella eitt innflutt fiskifar (§ 8, stk. 3).

Skotið verður upp, at hesar flytingar og samanleggingar av veiðuloyvum verða loyvdar, samstundis sum eigararnir av fiskiførunum, ið loyvini verða flutt á ella løgd saman við, kunnu njóta fiskirættindi svarandi til, at fiskiorkan hjá skipunum ikki verður størri ella økist við meir enn tí fiskiorkuni, ið var knýtt at flutta ella samanlagda veiðuloyvinum.

Útskifting

Løgtingsmál um endurnýgging av fiskiskipaflotanum, um umbyggingar og javnskipan av veiðiorku er/verður lagt fram, fer ætlandi at hava við sær, at eldri skip verða skift út við nýggjari. Seinastu árini eru umframt nøkur skip løgd/seld av landinum, uttan at onnur skip eru komin inn. Í slíkum førum verður givin tilsøgn um innflutningsloyvi og veiðuloyvi til annað fiskifar. Er talan um skip við veiðuloyvi til fiskiskap undir Føroyum, skal fiskiorkan hjá tí innflutta skipinum ikki vera størri enn á tí, sum tað kemur inn fyri.

Onki er ásett, hvussu leingi ein eigari kann hava eina tílíka tilsøgn, og heldur ikki hvussu tað er við rættindum í hesum tíðarskeiðunum. Vanliga hevur tilsøgn um veiðuloyvi til annað skip verið latin fyri 1/2 ár og hevur síðani verið longd, um tørvur hevur verið á tí. Til tess at hava greiðar reglur at ganga eftir verður skotið upp, at tilsøgn um innflutningsloyvi og veiðuloyvi til annað fiskifar kann verða givin í upp til 2 ár, og at eigarin hetta tíðarskeiðið varðveitir somu rættindi, sum hann hevði frammanundan. Hetta merkir í stuttum, at ein skipaeigari veit, undir hvørjum treytum hann aftur kann fáa sær skip, og at hann hetta tíðarskeiðið kann umsita fiskirættindini. Samsvarandi møguleikunum fyri at leggja veiðuloyvi saman verður skotið upp, at persónar ella felag við tilsøgn um veiðuloyvi til annað skip á sama hátt sum eigarar, ið hava skip við veiðuloyvi, kunnu leggja saman við øðrum.

Umseting av hjáveiðukvotum

Ikki allir skipabólkar eru undir skipanum, har rættindi kunnu umsetast. Djúpvatnstroluarnir eru ein av hesum. Teir eru ikki undir fiskidagaskipan og hava ikki part í kvotum, men hjáveiða teirra av toski og hysu er avmarkað við hjáveiðuprosentum. Hesir hava tí ongi rættindi at umseta ella at leggja saman við.

Grundað á hetta, heitti landsstýrismaðurin í fiskivinnumálum á Skipanarnevndina at viðgera, hvussu djúpvatnstrolararnir kundu hugsast at umseta rættindi síni. Skipanarnevndin mælti til at seta í verk eina skipan við egnum hjáveiðukvotum fyri djúpvatnstrolararnar, sum kunnu umsetast.

Nevndin hugsar sær, at tað ber til vegleiðandi at rokna, hvussu nógv tons av ávikavist toski og hysu tann egna hjáveiðukvotan er fyri fiskiárið. Hetta kann verða gjørt grundað á eina heildarveiðunøgd, sum Skipanarnevndin mælir landsstýrismanninum fyri fiskivinnumálum til at brúka sum útrokningargrundarlag. Tey ásettu prosentini í § 28, stk. 2 svara til hjáveiðupartin hjá djúpvatnstrolararunum undir eitum. Í fiskiloyvinum hjá hvørjum skipi verður síðani ásett, hvønn part - lutfalsliga og í tonsum hvørt fiskiárið (egin hjáveiðikvota) - eigari av djúpvatnstrolara eigur rætt til.

Loyvt skal vera at umseta egnu hjáveiðukvotu á sama hátt sum fiskidagar og egnar árskvotur. Hvørki vilja løgtingsins í huga, at tilfeingið er býtt millum skipabólkarnar, verður mælt til, at hjáveiðufiskirættindini hjá djúpvatnstrolararunum bert verða umsett innan fyri bólkin.

Nevndin sigur, at á henda hátt verður - á jøvnum føti við skip í øðrum skipabólkum - givnir djúpvatnstrolarum møguleikar at leggja fiskirættindi saman, so vinnugrundarlagið ikki verður tikið undan skipinum, so hvørt sum fiskimøguleikarnir verða skertir.

Tilmælið frá Skipanarnevndini er partur av hesum fógaruppskoti.

Aðrar broytingar

Trolarar við maskinorku undir 500 HK kunna fiska í tveimum av økjunum, sum samhæri § 9a eru stongd fyri trolveiðu. Verandi orðing "tó so at hestamegin fyri hvørt nýtt trol ikki fer upp um 500 HK" er ætlað at forða fyri partroling í hesum økjunum. Í staðin fyri hesa orðing, verður skotið upp at seta beinleiðis inn, at partroling ikki er loyvd á nevndu økjum. Umframt verður skotið upp, at ikki er loyvt at brúka dupultrol.
Í løgtingsmáli 78/96 varð skotið upp, at avmarka møguleikarnar hjá skipunum at skifta millum innaru og ytru fiskidagaleið. Samstundis vórðu eftir uppskoti frá Vinnunevndini gjørdar broytingar í markinum millum innaru og ytru fiskidagaleið, sum avmarkaðu roymdina eftir toski á ytru leiðini nógv. Treytirnar fyri skifting eru tí kanska blivnar ov avmarkandi og verður tí skotið upp, at skerpingin, sum varð gjørd í § 29, stk. 3 í løgtingsmáli nr. 78/96, verður strikað.

Grundgevingarnar fyri hesum eru, at skipini ofta plaga at fara út á djúpt vatn fyrst á túrinum. Ber onki til har, verður fiskt inn eftir, men verandi áseting forðar fyri at fara á innaru fiskidagaleið uttan av avreitt verður fimillum. Hetta hevur við sær, at skipini ikki so nógv fara á ytru leiðina, men verða liggjandi á toska- og hýsuleið.

Í beinleiðis veiðu við troli og snellu verður ein fiskidagur roknaður frá miðnátt til miðnátt, men í beinleiðis veiðu við líni, kann samdøgrið verða roknað sum landsstýrið ásetir. Skotið verður upp, at eisini í veiðu við troli og snellu, kann samdøgrið verða roknað sum landsstýrið ásetir. Við framkomnari telefonfráboðanarskipan ber nú vel til hjá Fiskiveiðueftirlitinum at skráseta túralongd gjørda upp í samdøgur, grundað á, nær fiskifar er farið úr havn, og tíl tað er aftur í havn. Eins og hevur verið gjørt fyri útróðrarbátar, fer Fiskimálastýrið í fiskiloyvunum hjá fiskiførum í øðrum skipabólkum undir fiskidagaskipan at áseta, at ein fiskidagur verður roknaður frá tí at farið verður úr havn og fyri hvørjar 24 tímar.
Ein velvirkandi skipan er grundað á, at tann, sum hevur eftirlit við, at ásetingar í lógini verða hildnar, hevur neyðugar og greiðar heimildir. Tí verður skotið upp, at um brot verða framd á treytir viðv. tí, sum skipið hevur loyvi at fiska eftir um skipið ikki lýkur treytir ásettar í fiskiloyvinum, kann Fiskiveiðueftirlitið beinanvegin taka veiðu- og fiskiloyvi aftur í upp til 2 vikur. Her kann t. d. verða talan um fiskifar, sum ikki hevur hildið seg innan fyri galdandi reglur um hjáveiðu, fráboðanarskyldur, krav til skjøl umborð o. l.

Skotið verður upp at gera greiðari skilnað millum allýsing og arbeiðsuppgávur fyri Fiskirannsóknarstovuna, Fiskiveiðueftirlitið, Stovnsrøktarnevndina og Skipanarnevndina. Munurin fyri Fiskirannsóknarstovuna og Fiskiveiðueftirlitið eru, at hesi nú fyrisitingarliga verða skipað undir landsstýrismanninum í fiskivinnumálum við somu uppgávum sum frammanundan.

Samsvarandi stýrisskipanarlógini verður skotið upp, at tær heimildir, sum lógin gevur landsstýrinum, verða givnar landsstýrismanninum í fiskivinnumálum.

Lógaruppskotið hevur verið til umrøðis í Fiskivinnu Starvsnevndini. Nevndin viðgjørdi málið á fundi týsdagin 24. februar 1998; nevndin hevði ongar viðmerkingar til uppskotið.

Mett verður ikki, at broytingarnar, sum her verða skotnar upp, fara at broyta nakað um kostnaðin av at umsita lógina um vinnuligan fiskiskap.

Mælt verður løgtinginum til at samtykkja uppskotið.

Viðmerkingar til tær einstøku broytingarnar

ad. 1) Fyrsta kapittul í lógini um vinnuligan fiskiskap fevnir um lógarverk, endamál, allýsingar v. m. Tí verður ikki hildið hóskandi, at nágreiniliga uppgávan hjá Skipanarnevndini verður ásett her. Á hesum stað skal bert staðfestast, at nevndin verður sett, hennara arbeiðsøki, og hvussu hon verður sett. Arbeiðsuppgávurnar hjá Skipanarnevndini verða ásettar í § 22, stk. 4-5. (Broyting 17).

ad. 2) Skotið verður upp at broyta allýsingina av einum fiskidegi soleiðis, at hann verður eitt samdøgur, roknað sum landsstýrið ásetir. Hetta er ein broyting fyri fiskiskap við troli og snellu, men fyri fiskiskap við líno hevur landsstýrið hesa heimild frammanundan.

ad. 3) Eins og viðvíkjandi broytingini viðvíkjandi Skipanarnevndini (broyting 1) verður í stk. 9 skotið upp, at nágreiniligt arbeiðssetningurin hjá Stovnsrøktarnevndini ikki verður ásettur í § 5. Her verður bert staðfest, at nevndin verður sett, hennara arbeiðsøki og hvussu hon verður mannað. Arbeiðsuppgávan hjá Stovnsrøktarnevndini verður ásett í § 22, stk. 3 (broyting 18).

ad. 4) Fiskiveiðueftirlitið verður eftir hesi broyting skipað undir landsstýrismanninum í fiskivinnumálum og sostatt ein fyrisitingarlig eind í Fiskimálastýrinum. Hetta ávirkar ikki uppgávurnar hjá Fiskiveiðueftirlitinum.

ad. 5) Fiskirannsóknarstovan verður eftir hesi broyting skipað undir landsstýrismanninum í fiskivinnumálum og sostatt ein fyrisitingarlig eind í Fiskimálastýrinum. Hetta ávirkar ikki uppgávurnar hjá Fiskirannsóknarstovuni.

ad. 6) § 8 verður orðað av nýggjum. Verandi § 8, stk. 1 ásetir treytir fyri, hvør ið kann fáa rættindi at fiska. Henda áseting verður flutt til § 12 í kapittuli 3, sum fevnir um fiskidaga- og kvoturættindi. Skotið verður upp, at gera nýggja § 8, sum ásetir hvussu veiðuloyvi kunnu verða flutt frá einum skipi til eitt annað, og hvussu samanlegging av veiðuloyvum kann fara fram.

Treytir fyri at kunna flyta veiðuloyvi frá einum skipi til eitt annað var ásett í strikaðu § 8, stk. 2. Skotið verður upp at seta somu treytir inn í nýggju § 8, stk. 1 við smærri broytingum, sum ikki ávirka innihaldið í ásetingini.

Skotið verður upp, at tað skal hera til at kunna flyta veiðuloyvi og fiskirættindi frá einum fiskifari á eitt annað, sum er í flotanum frammanundan (§ 8, stk. 2) og at kunna flyta veiðuloyvi og fiskirættindi frá tveimum ella fleiri fiskiførum á eitt fiskifar uttan veiðuloyvi ella eitt innflutt fiskifar (§ 8, stk. 3).

Hesar flytingar og samanleggingar av veiðuloyvum verða loyvdar, samstundis sum fiskiførini, ið loyvini verða flutt á ella løgd saman við, kunnu tjóta fiskirættindi svarandi til, at fiskiorka tess ikki verður størri ella økist við meir enn tí fiskiorkuni, ið var knytt at flutta ella samanlagda veiðuloyvinum.

Í § 8, stk. 4, 5 og 6 verður skotið upp at áseta, hvussu tilsøgn kann veitast, um veiðuloyvi til annað skip ístaðin, um fiskifar við veiðuloyvi verður lagt, ravðisavmarkað ella strikað úr skipaskránni. Samsvarandi møguleikunum fyri at leggja veiðuloyvi saman verður skotið upp, at persónur ella felag við tilsøgn um veiðuloyvi til annað skip á sama hátt sum eigarar, ið hava skip við veiðuloyvi, kunnu leggja saman við øðrum.Skotið verður upp, at landsstýrismaðurin í fiskivinnumálum í serligum førum kann víkja frá 2 ára tíðar-

freistini. Slík serlig fyri kunnu vera, um eigarin kann prógva, at hann innan rímuliga tíð hevur eitt annað fiskifar, sum lykur treytirnar.

Í § 8, stk. 7 verður heimilað landsstýrinum at áseta nærri reglur knyttar at umsitingini av stk. 1-5.

ad. 7) Her verður skotið upp, at landsstýrinum verða givnar somu heimildir, tá talan er um kvotuskipan, sum tær heimildir landsstýrið eftir verandi lógartekst hevur, tá talan er um fiskidagaskipan.

ad. 8) Her verður skotið upp, at avmarka allari trolveiðu innan fyri ásettu staðfestingarnar fyri skip við maskinorku uppá 500 HK ella støri.. Áðrenn varð ikki sagt beinleiðis partrol og dupulttrol var ikki nevnt.

ad. 9) Her verður skotið upp, at avmarka allari trolveiðu innan fyri ásettu staðfestingarnar fyri skip við maskinorku uppá 500 HK ella støri.. Áðrenn varð ikki sagt beinleiðis partrol og dupulttrol var ikki nevnt.

ad. 10) Tá lógin um vinnuligan fiskiskap var til viðgerðar í løgtinginum á vári 1997 (løgtingsmál nr. 78/96) varð allýsingin av virking av veiðu strikað í táverandi § 19. Skotið verður upp at seta allýsingina fyri virking av veiðu inn aftur í lógina - hesaferð inn í § 10.

ad. 11) Í verandi § 11, stk. 3 er ásett, at fiskiskapur við fiskiførum undir føroyskum flaggi uttanfyri føroyska landleiðirnar bert kann fara fram við loyvi frá Føroya landsstýri, og kann landsstýrið í loyvinum áseta nærri treytir fiskiskapinum viðvíkjandi. Í verandi § 11, stk. 1 er samstundis ásett, at fyri at kunna fara til vinnuligan fiskiskap á føroysku landleiðunum krevst veiðu- og fiskiloyvi. Skotið verður upp, at leggja hesar tvær ordingarnar - bara galdandi fyri ymisk fiskiøki - inn í somu ordning; stk. 3 verður strikað og stk. 1 broytt samsvarandi. Samstundis verður heimilað landsstýrinum í fiskiloyvinum at áseta nærri treytir fyri fiskiskapinum í føroyskum sjógvi eins og tað í stk. 3 var heimild fyri tí uttan fyri føroyskt sjóøki. Skotið verður eisini upp, at heimild verður fyri at áseta nærri treytir viðvíkjandi reguliguum fráboðanum til Fiskiveiðueftirlitið.

ad. 12) Skotið verður upp at strikað § 12 og seta hesa ordning inn. Hetta er verandi § 8, stk. 1. Endamálið við hesi broyting er at savna ásetingarnar um fiskirættindi undir viðkomandi kapittul í lógini. Broytt innihald í verandi § 12 verður flutt til § 13.

ad. 13) Hetta er nýggj áseting, sum partvíst hevur samband við treytirnar um umseting av fiskirættindum, sum ásett/skotið upp í §§ 14 og 15. Í verandi lóg ásetir § 12, hvønn rætt fiskifør hava. Henda áseting er ógreið, tí hædd ikki nóg væl er tikin fyri, hvussu veiðuloyvi og fiskiloyvi verða latin (samb. § 5, stk. 3-4). Skotið upp, at rættindini, sum eigarar av fiskiførum fáa, hava gildi í 10 ár í senn fyri fiskifør 15 BRT ella støri fyri 10 ár og upp til 5 ár fyri fiskifør undir 15. Skilnaðurin verður gjørdur, tí samtaert § 5, stk. 3 verða veiðuloyvi latin fiskiførum 15 BRT og støri uttan tíðaravmarking, men fyri fiskifør undir 15 BRT verða veiðuloyvi latin fyri upp til 5 ár. Henda broyting varð framd við løgtingsmáli nr. 78/96. Meginorsøkin til henda skilnað er, at fyri fiskifør undir 15 BRT eru treytir, sum eru tengdar at fiskiskapinum árið frammanundan, settar í kunngerð fyri, nær eigari av slíkum fiskifari hevur rætt til fiskiloyvi.

Fyri fiskifør 15 BRT og støri skal ásetingin skiljast soleiðis, at játtan um fiskirættindi verður latin fyri 10 ár í senn galdandi frá fiskiársins byrjan. Í fiskiloyvið verða rættindini fyri inniverandi fiskiár talfest. Árið eftir verða rættindi aftur givin fyri næstu 10 árini, og fiskirættindini tað árið talfest o. s. fr.

Fyri fiskifør undir 15 BRT fevnir rættarin til fiskidagar í upp til 5 ár, men er tó treytaður av, at eigarin av fiskifarinum lýkur treytirnar fyri at fáa fiskiloyvi við ásettum fiskidøgum.

Eigari av fiskifari, ið hevur fingið fiskiloyvi til fyribils ella avmarkað rættindi sambært § 5, stk. 4, fær tó bert tey í fiskiloyvinum fyribils ella avmarkaðu rættindini tað ávísa fiskiárið.

ad. 14) Í § 14 verður ásett, hvussu fiskidagar kunnu umsetast. Grundað á, at orðingin "frá tí degi teir seinast eru umsettir" kann tykjast ógreiða, verður skotið upp at broyta hana. Meginreglan viðvíkjandi umsetingini av fiskirættindum, sum varð viðtikin við løgtingslóg 78/96 var, at rættindini kunnu umsetast í 10 ár. Hetta verður varðveitt, men skilnaður verður gjørdur millum leigaðar og seldar fiskidagar. Leigaðir dagar falla aftur til upprunaeigaran, um hann, tí leigumálið er liðugt, hevur fiskifar við veiðuloyvi, men søla av fiskidøgum er endalig avhending.

Eisini verður skotið upp, at umseting av fiskirættindum verður fráboðað Fiskiveiðueftirlitinum skrivliga og skal verða váttað av báðum pørtum.

ad. 15) Í § 15 verður ásett, hvussu egin kvotupartur, egnar árskvotur og egnar hjáveiðukvotur kunnu umsetast. Viðmerkingarnar til hesa broytingina eru annars fær somu sum til broyting 15.

ad. 16) Sambært § 5, stk. 4 er tað eigarin av fiskifari við veiðuloyvi, sum fær fiskiloyvi. Broytingin verður gjørd, so samsvar er millum § 5, stk. 4 og § 21.

ad. 17) Í § 22 verður ásett, hvussu fram skal verða farið, tá fiskidagatal verður ásett fyri botnfiskaveiðu á føroyska landgrunninum. Hetta fatar um hvør, ið skal láta landsstýrinum stovnsmetingar og tilmæli og hvussu Skipanarnevndin skal viðgera hesi. Í viðmerkingunum til broytingar í § 5 (broyting 2 og 3) varð greitt frá, at broytingar eisini vórðu gjørdar í § 22. Endamálið við broytingunum er at greina allýsingar (í § 5) og arbeiðsuppgávur í samband við áseting av fiskidøgum fyri botnfiskaveiðu á føroyska landgrunninum sundur í røttu lógargreinirnar. Nýggju orðingarnar í § 5 og í § 22 broyta onki viðvíkjandi uppgávunum hjá Fiskirannsóknarstovuni, Stovnsrøktarnevndini ella Skipanarnevndini.

Á hvørjum ári innan hvønn 15. juli skal Skipanarnevndin láta landsstýrismanninum í fiskivinnumálum tilmæli um fiskidagatal fyri komandi fiskiár. Tó kann nevndin, við heimild í stk. 5, um ávísar fortreytir eru til staðar, láta landsstýrismanninum tilmæli um broytingar í fiskidagatalinum fyri eitt inniverandi fiskiár. Eftir verandi lógaráseting er ongin áseting um, nær Skipanarnevndin skal hava latið landsstýrinum sítt tilmæli. Ásetanin um at fiskidagatal fyri Føroya Banka verður ásett við løgtingslóg verður strikað, tí landsstýrið sambært § 29, stk. 2 er heimilað at áseta fiskidagaskipan í verk fyri Føroya Banka.

ad. 18) Umframt at einstakar málsligar broytingar eru gjørdar í stk. 1, 4 og 5, so samsvar er millum heitini í allýsingunum í § 5 av felags árskvotu og egnar árskvotur, er sett inn í stk. 1, at har fiskirættindini eru ásett sum fiskidagar, kann landsstýrið láta fiskifør fiska av ásetta dagatalinum undir einum ella lutað dagarnar millum skipini. Hetta verður gjørt, so samsvar er millum møguleikarnar hjá myndugleikunum at láta fiskirættindi uttan mun til um tey eru avmarkað við kvotum og við fiskidøgum. Ongar broytingar eru gjørdar í stk. 2 og 3.

ad. 19) Broytingin í § 29 gevur fiskifórum møguleika at fara av ytru fiskidagaleiðini á ta innaru uttan at bróta túr av. Samsvarandi verandi lógarteksti er hetta ikki loyvt.

ad. 20) Í løgtingsmáli 78/96 skeyt landsstýrið upp at høvuðsbólkur 5 var skildur sundur í undirbólkar, og at m. a. ásetta fiskidagatalið fyri bólk 5D varð nytt eftir áseting frá landsstýrinum fyri eitt hálvt ár ísenn. Løgtingið tók ikki undir við at skilja høvuðsbólk 5 í undirbólkar í lógini um vinnuligan fiskiskap, men gloymdi tó at strika punktum 2 í § 29, stk. 4. Tí verður skotið upp, at hetta verður strikað, og at tann upprunaligu orðingin um, at dagamir í bólki 5 verða at nyta sambært áseting í kunngerð frá landsstýrinum fyri eitt hálvár ísenn, verður sett inn aftur. Henda orðingin er ein av heimildunum fyri kunngerð nr. 109 frá 25. juli 1996 við seinni broytingum um treytir fyri fiskiloyvi og reglur um fiskidagatal til útróðrarbátar undir 15 BRT.

ad. 21) Allýsingin av Fiskiveiðueftirlitinum verður gjørd í § 5, stk. 10, har sagt verður, at Fiskiveiðueftirlitið er fyrisitingarligað skipað undir landsstýrismanninum í fiskivinnumálum. Tí verður gamla orðingin í § 33, stk. 1 um at "Fiskiveiðueftirlitið er stovnur undir landinum, hvørs endamál er at fyrisita ..... " broytt, so her nú bert verður ásett, hvat Fiskiveiðueftirlitið skal gera.

ad. 22) Seinast lógin um vinnuligan fiskiskap var til viðgerðar í løgtinginum (løgtingsmál nr. 3/1997 varð broyting gjørd í § 40, stk. 1, nr. 2 og 3, men av misgávum varð víst til skeivan tekst, so ivi hevur tikið seg upp, um lýsti lógarteksturin hevur gildi. Fyri at beina henda iva av vegnum, verður henda orðing í § 40, stk. 1 nr. 2 og 3 skotin upp.

ad. 23) Her verður skotið upp, at lógarteksturin samsvarar við allýsingarnar í § 5. Harumframt verður skotið upp, at fyri brot á kunngerð um loyvda hjáveiðu, verða somu sektarmøguleikar sum fyri onnur brot.

ad. 24) Fiskiveiðueftirlitið kann eftir verandi lógarteksti taka veiðu- og fiskiloyvi aftur, um skipari er skuldsettur fyri brot á ávísar lógarreglur, og um hann hevur framt ovurveiðu á og uttanfyri føroysku landleiðirnar. Frá einum eftirlitissjónarmiði er orðingin "og um ovurveiða ..." ikki nøktandi, tí ivasamt er, um skipurin bæði skal vera skuldsettur fyri brot og hava framt ovurveiðu, ella um heimildin eisini er galdandi, um hann bert hevur framt ovurveiðu. Harumframt er ongin allýsing av "ovurveiða" í lógini.

Tørvur er á at kunna taka stig mótvegis skipum, sum ikki halda seg til ásettar treytir ásettar í kunngerðum (t.d. viðv. mest loyvdari hjáveiðu) ella í fiskiloyvum (t. d. ymiskar frálæðanarskyldur fnoknað at lata veiðuupplýsingar og dagbøkur inn sum ásett, krævd skjøl umborð o. l.). Broytti lógarteksturin heimilar Fiskiveiðueftirlitinum at taka fiskiloyvi aftur í upp til 2 vikur fyri slík brot. Tó verður givið eigara tríggjar daga freist við umseting av egnum kvotum, egnum hjáveiðukvotum ella fiskidøgum at lúka treytirnar.

Heimildin hjá Fiskiveiðueftirlitinum at taka veiðuloyvi aftur verður strikað í stk. 1 og í stk. 2. Hesa heimild hevur landstýrismaðurin í fiskivinnumálum sambært § 45, stk. 2 fyri ávíst tíðarskeið og endaliga fyri grov brot sambært § 47.

ad. 25-31) Hesar broytingar verða gjørdar samsvarandi nýggju stýrisskipanarlógini. Heimildir landsstýrisins sambært verandi lóg verða nú givnar landsstýrismanninum í fiskivinnumálum.

ad. 31-33) Hetta eru málsligar rættingar.

Málið fall burtur sbr. stýrisskipanarlógini § 15 stk. 3, tí at løgtingsval var 30. apríl 1998, og málið ikki var liðugt viðgjørt á tingi fyri valið.

F.L. j.nr. 1501-1/91

143 Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um meirvirðisgjald

Ár 1998, hósdagin 5. mars, legði Anfinn Kallsberg, landsstýrismaður, vegna landsstýrið fram soljóðandi

Uppskot
til
løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um meirvirðisgjald

§ 1.

Í løgtingslóg nr. 136 frá 8. september 1992 um meirvirðisgjald við seinni broytingum verða gjørdar hesar broytingar:

1) Í § 23a, stk. 4 verður 3. pkt. orðað soleiðis:
"Er tann avgjaldsskyldigi eitt vinnufelag v.m., verður sum eigari eisini roknaður ein persónur, ið eigur slíkar fíggjarpartar í avgjaldsskylduga virkinum, sum verða roknaðir sum partabrøv hjá høvuðspartaeigara smb. § 4a, stk. 2-4 í virðisbrævaskattalógini, ella eitt vinnufelag v.m., sum eigur slíkar fíggjarpartar í avgjaldsskylduga virkinum."

2) Aftaná kap. XIII. verður sum nýtt kap. sett:
"XIIIa. Eftirgeving
§ 38a. Avgjald, rentur, gjøld og fyrisitingarligar bøtur sambært hesari lóg kunnu eftirgevast, um:
skuldnarin prógvar, at hesin ikki er førur fyri og innanfyri tey næmastu árini eingi útlit hevur til at kunna svara sínum peningaligu skuldbindingum, og
viðurskifti hjá skuldnaranum og umstøðurnar annars tala fyri hesum.
Stk. 2. Samsvarandi kunnu upphæddir eftirgevast, sum persónar eru skyldugir at gjalda sum endurgjald fyri manglandi gjald hjá felløgum fyri avgjald.
Stk. 3. Við nýtslu av stk. 1, nr. 2, skal serligur dentur leggjast á, um skuldnarin bert ella einamest hevur skuld sum skatta-, toll- og avgjaldseftirstøður, áhugamál hjá skuldnara í eftirgeving, aldurin á skuldini, umstøðurnar tá skuldin er íkomin og skuldarafturgjaldingin higartil, eins og viðurskiftini hjá skuldnara meðan málið um eftirgeving verður málsviðgjørt.
Stk. 4. Eftirgeving kann bert fráboðast skuldnarum, sum eru likamligir persónar, smb. tó stk. 8.
Stk. 5. Eftirgeving kann innibera at skuldin hjá skuldnara fellur burtur ella verður niðursett. Í sambond við at skuldin verður niðursett kann avgerð takast um, at afturgjaldingin av skuldini verður ásett, og at avdráttarskipan kann fáast í lag fyri at gjalda niður tann ikki eftirgivna partin av skuldini. Í tíðarskeiðnum við útseting av afturgjalding og í avdráttartíðini verður eingin renta at rokna av skuldini.
Stk. 6. Eftirgeving kann fella burtur, um:
skuldnarin í samband við málið um eftirgeving hevur gjørt seg sekan í svikum ella tílíkum viðurskiftum, ella
skuldnarin grovt setur til síðis sínar skyldur í samband við afturgjalding av tí ikki eftirgivna partinum av skuldini.
Stk. 7. Um skuldnarin ikki kann prógva, at hesin ikki er førur fyri og innanfyri tey næmastu árini eingi útlit hevur til at kunna svara sínum peningaligu skuldbindingum, smb. stk. 1, nr. 1, kann ístaðin fyri eftirgeving av skuld, fráboðast skuldnaranum útsetilsi við afturgjalding av skuld. Stk. 1, nr. 2, stk. 2-4 og stk. 6, nr. 1, skulu tilsvarandi nýtast í sambond við fráboðan av útsetilsi av afturgjalding.
Stk. 8. Eftirgeving ella útseting av afturgjalding kann annars, tá viðurskifti í heilt serligum føri tala fyri tí, fráboðast persónum, felløgum, felagsskapum, sjálvsognarstovnum, grunnum ella líknandi.
Stk. 9. Toll- og Skattstovu Føroya, Stýrið kann, fyri at letta um umsitingina av smærri peningakrøvum, leggja fram krav til strikingar við fyrisitingarligari grundgeving.
Stk. 10. Heimild til eftirgeving av skuld o.a. eftir hesi grein hevur Toll- og Skattaráð Føroya. Umsóknir, ið skulu skjalprógva øll viðkomandi viðurskifti, verða at senda til Toll- og Skattaráð Føroya til støðutakan. Avgerðir ráðsins eru fyrisitingarliga endaligar.
Stk. 11. Í grundarlagnum fyri avgerð um eftirgeving av skuld o.a. kunu inngongi eitt tiltmæli frá løgardeildini í Stýrinum hjá Toll- og Skattstovu Føroya."

§ 2

Hendan løgtingslóg kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

§ 3

Lógin fevnir um eftirgeving v.m. av skuld, ið er konin áfianá ígildissetan av løgtingslóg um meirvirðisgjald, lóg nr. 136 frá 8. september 1992.

Almennar viðmerkingar

Í hesum uppskoti til broyting í løgtingslóg um meirvirðisgjald, sum nú verður lagt fyri tingið, eru tvær broytingar.

Tann fyrra, sum er ein broyting í § 23, er ein nágreining av galdandi reglu.

Tann stóra broytingin er, at vit fáa inn í meirvirðisgjaldslógina eitt nytt kapittul XIIIa, sum inniheldur reglur um eftirgeving og útsetilsi av afturgjalding av skuld.

Galdandi meirvirðisgjaldslóg inniheldur ikki møguleikar, sum hendu broyting fevnir um. Við broytingini verður grundarlag fyri at tillaga siðvenju hjá skattavaldinum áleiðis til vanligu siðvenjuni hjá skiftirætti um skuldarsanering o.a.

Grundarlagið fyri uppskotinum er, at sleppast kann undan at gjøgnumføra mál um skuldarsanering í skiftirættinum, tá tað bert ella í høvuðsheitum er talan um skuld til skattavaldið.

Er talan um aðrar almennar ella privatar kreditorar av munandi týdningi, verður skuldarin vístur til at royna eina heildarloysn, t.d. skuldarsanering ella sjálvboðna kreditorskipan eftir meginreglunum um skuldarsanering o.a.

Ætlanin við skipanini er, at tað í serligum føri skal gerast møguligt at fremja loysn, ið inniber at sleppast kann undan stóðugari botnleysari skuld hjá persónum, ið greinin í høvuðsheitum fevnir um.

Mett verður, at ein slík skipan betrar munandi um rættartrygd borgarans, orsakað av, at hesin undir serligum umstøðum fær møguleika fyri at royna eina skipan, ið møguliga ikki hevði verið roynd, um gangast skuldi aðrar meiri formellar vegir, fyri at fáa í lag eftirgeving av skuld ella útsetilsi við afturgjalding.

Við hesi lógarbroyting verður tann akutti tørvurin við at eftirgeva meirvirðisgjaldsskuld mótroknaður. Men framvegis verður arbeitt við tankanum um at tað er sami myndugleiki sum eftirgevir alla skuld til landskassan, tað veri seg orsakað av meirvirðisgjaldið, skatti ella aðrari skuld.

Annars verður skotið upp, at skapa ein møguleika til umsitingina fyri eftirgeving/striking av smærri krøvum, tá talan er um lítlar upphæddir, sum annars høvdu havt við sær útreiðslur í sambandi við umsiting, og umstøðurnar í málinum annars tala fyri tí. Við møguleika fyri at mál av lítlum og ongum týdningi kunnu strikast/avskrivast, verða skaptar fortreytir fyri, at gjørligt verður hjá umsitingini at rudda upp í smærri málum, ið mett verður at tað finst ein hópur av.

Toll- og Skattstova Føroya skal ikki eftir hesum uppskoti átaka sær nakran virknan lut í málsviðger í sambandi við eftirgeving o.a. Í ávísan mun verður tó neyðugt hjá ráðnum at fáa fakliga ráðgeving, ið sostatt eisini virkar til at arbeiðsbyrðan í ávísan mun økist hjá stovninum.

Í fyrstu atløgu kann skipanin viðføra eina støri arbeiðsbyrðu hjá ráðnum, av tí at málsviðgerðin í tílíkum málum er umfatandi. Avleiðingin kann verða, at ráðið leitar sær fakliga óheftu ráðgeving við fíggjarligum kostnaði við sær.

Sjálv eftirgevingin hareftirímóti verður ikki mett at hava við sær fíggjarligan kostnað. Í tí føri, at skuld varð

eftirgivin, heilt ella lutvist, vildi sak við skiftirættin innihaldið eina minst líka víttfevnandi loysn, sum skotið verður upp her. Talan er sostatt ikki um at fíggjarligan kostnað, ið gerst stórri enn tigartil, men heldur um ein møguleika, sum verður skaptur ein møguleiki afturat tí verandi.

Tað hevur í fyrstu atløgu við sær fíggjarligan kostnað fyri landskassan, tá skaptur verður ein moguleiki fyri at smærri krøv kunnu strikast. Tá ið umvent havt verður í huga, hvørja arbeiðsorku umsitingin verður noydd at leggja í mál, oflast uttan at tað í síðsta enda spyrst nakað nøktandi úrslit burturúr, t.d. áminning, renturokning og at enda innkrevjingini av smærri krøvum, er helst í síðsta enda ikki talan um ein veruligan fíggjarligan meirkostnað. Vert er at leggja til merkis, at hópur av smærri lýðningarleysum krøvum eru uppstaðin vegna hópskrásetingar av virksemi við ígildissetan av lógini um meirvirðisgjald. Í tann mun at gomul krøv enn eru hangandi í kervinum hjá skattavaldinum, er ætlanin, at krøvini skulu fyrireikast til eftirgeving/striking, tá tað ikki verður mett at vera grundarlag fyri áhaldandi at umsita hesi, uttan at lutfalsliga stórri umsitingarligar útreiðslur verða úrslitið í mun til áljóðandi á peningakravinum. Í hesum sambandi verður fíggjarligi kostnaðurin mettur til at mótsvara sparing í umsiting innan umráði, sum eftir royndum hevur víst seg at verða uttan úrslit í longdini.

Viðmerkingar til tær einstøku broytingarnar

§ 1, nr. 2, stk. 1:

Tað skal verða lutfalsliga stórur munur millum gjaldførí skuldnara og skuld hansara til skattavaldið.

Ognir skuldnara, núverandi inntøkur og framtíðar inntøkumøguleikar hansara skulu haldast upp ímóti neyðugum útreiðslum og støddini á skuldini. Tað skal ikki bert leggjast dentur á egin viðurskifti skuldnara, men á viðurskiftini hjá øllum húski hansara. Inntøkuviðurskifti hjá møguligum hjúnafelaga ella persóni, ið ein livir saman við, verða at taka við í metingina. Ognir hjá hesum kunnu á sama hátt sum við siðvenju innan skuldarsanering inngongga í metingina, um serlig viðurskifti tala fyri hesum. Til dømis í tí føri, har inntøkurnar hjá hjúnafelagnum ikki strekkja til gjøldini, ið skulu gjaldast fyri ognirnar hjá hesum.

Hædd skal takast fyri, um lán kunnu takast til ognir ella um hesar kunnu seljast, um tær eru neyðugar hjá skuldnara og húski hansara ella. Eini hús, har skuldnarin og húski hansara byr, eru bert sum útgangsstøði neyðug at selja, um útreiðslurnar eru órímiliga stórar við at húgva í hesum. Afturkeyp ella heving av einari pensiónsskipan o.a. eigur at verða kravt í sama mun sum eftir siðvenju viðvíkjandi skuldarsanering. Tað verður sæð burtur frá minni upphæddum ella skipanum, ið ikki kunnu afturkeypast. Tað kann eisini takast hædd fyri útlitum fyri at skuldnari arvar, hartil hvørjir møguleikar eru til staðar fyri at lúta arvaforskot.

Í tráð við vanligar meginreglur fyri skuldarsanering, verður tað við eftirgevingini sæð burtur frá pantikrøvum í tann mun, at pantið strekkir til.

Viðvíkjandi inntøkuviðurskiftum skal metast um, um útlit eru fyri at hesi verða munandi betrað. Tað skal somuleiðis takast hædd fyri, um framflyting av undirskoti er orsøk til, at inntøkuskattur ikki verður goldin. Eru inntøkuviðurskifti skuldnara (og húskinum) munandi lægri enn vanligt er, skulu møguleikarnir fyri einari afturgjalding av skuldini síggjast við hesum fyri eyga. Hevur skuldnarin í longri tíð vegna arbeiðsloysi fingið peningaliga veiting frá arbeiðsloysistrygging ella almannaverki, og eru tað ikki útlit fyri at tey peningaligu viðurskiftini fara at gerast betri, er hetta ein støða, ið inngongur við munandi vekt í metingini av, um eftirgeving kann játtast. Í tí føri, at inntøkan hjá húskinum er óvanliga høg, útilokar hetta í sjálvum sær ikki eftirgeving . Hóast hetta eigur skuldin í hesi støðu at verða tilsvarandi støri, áðrenn talan kann vera um at eftirgeva.

Tað kunnu ikki uppstillast heildarkrøv fyri, hvussu stór skuldin skal verða, fyri at hon kann eftirgevast. Tað avgerandi er, um skuldnari, tá hædd verður tikin fyri teimum níverandi peningaligu viðurskiftunum og teimum fortreytum, ið kunnu uppstillast fyri framtíðar inntøkumøguleikarnar, ikki er førur fyri at uppfylla sínar peningaligu skuldbindingar. Støddin á skuldini má í hesum sambandi eisini havast upp ímóti aldri skuldn-

ara, útbúgving og arbeiðsmøguleikum hansara o.a.

Tá metast skal, um skuldnari ikki hevur útlit til at gjalda skuldina, má hædd takast fyri rímiligum útreiðslum til bústað, neyðugum bili, øðrum rímiligum føstum útreiðslum, liviútreiðslum og uttdirhaldsskyldum annars.

Stk. 2:
Til dømis kann henda regla nytast tá talan er um upphæddir, ið stjórar verða dømdir til at gjalda sum endurgjald fyri manglandi inngjalding av skatti , mvg o.ø., hjá einum felagi.

Tað er í hesum føri talan um, at teir umroddu persónar verða álagdir eina borgarrættarliga ábyrgd fyri aftur**hildnar** upphæddir, við stoði í vanligum endurgjaldsreglum.

Stk. 3:
Tað skal gerast ein meting av, um skuldnarin við eftirgeving av skuldini fær møguleika fyri at svara sínum skyldum í framtíðini. Við lutvísari eftirgeving skal tryggjast, at skuldari fær ein veruligan møguleika fyri at gjalda tann frestandi partin av skuldini.

Við meting av viðurskiftunum hjá skuldnaranum og umstøðunum annars, skulu innganga ymsir partar, sum verða umrøddir niðanfyri undir punkt a.

Fyri sjálvstøðugt vinnurekandi skal harafturat byggjast eftir ymiskum serligum viðurskiftum. Hesir partar verða umrøddir niðanfyri undir punkt b.

Eingin einstakur partur er í sær sjálvum avgerandi fyri, um eftirgeving skal játtast. Tað má gerast ein samlað meting av umstøðunum í tí einstaka málinum.

a.: Aldur á skuldini er ein partur, ið kann takast við í metingini av, um eftirgeving skal játtast. Jú eldri skuldin er, jú betri eru møguleikarnir fyri eftirgeving.

Tað talar fyri at eftirgeva, um skuldari loyalt hevur roynt eftir førinum hvat gjaldføri viðvíkur, at gjalda niður uppá skuldina.

Er tað eftir at skuldin er komin hend álvarsom, longrivarandi sjúka, vanlukka ella avgerandi broytingar, t.d. yvirgongd til fólkapensión, vil hetta somuleiðis tala fyri eftirgeving.

Tað talar ímóti at eftirgeva í teimum føri, har skuldin er komin við revsiverdum viðurskiftum, ella t.d. um skuldin miðvíst er arbeitt upp og hetta er hent yvir longri tíð. Við eftirgeving av bótum, skal tískil gerast ein meting av, hvussu revsiverdugu viðurskiftini eru háttað í mun til aðrar umstøður í málinum.

b.: Er virkið avhendað til hjúnafelaga ella persón, ið ein livir saman við, men skuldari áhaldandi rekur virkið, ella heldur virkið á fram í líki av virki við skuldara sum veruligur leiðari, kann skuldin sum meginregla ikki eftirgevast. Undantak kann gerast, um virksemið hevur minni, lítlan ella ongan, peningaligan/ búskaparligan týdning.

Í tí føri at skuldarin áhaldandi rekur virki, men skuldin ikki stavar frá hesum virkinum, er tað ein treyt fyri eftirgeving, at tað ikki er arbeitt upp skuld av týdningi í nýggja virkinum.

Í tí føri at tað eru aðrir almennir ella privatir kreditorar av munandi týdningi, má skuldnari mælast til at royna eina heildarskipan aðrastaðni, t.d. í líki av skuldarsanering ella sjálvboðnari kreditorskipan.

Stk. 5:
Tað má hvíla á eina meting av peningaligu/búskaparligu viðurskiftum skuldnara (og húskinum), um tað skal fráboðast full ella lutvís eftirgeving.

Við lutvísari eftirgeving er ætlanin, at skuldin skal verða niðursett so nógv, at skuldnari gerst førur fyri at gjalda frestandi partin yvir 5 ár. Niðurseting verður ásett, grundað á eina forsøgn um væntaðar inntøkur og útreiðslur hjá skuldnara (og húskinum) í ásetta tíðarskeiðnum, við hædd fyri at skuldnari og húski hansara kann varðveita ein kravlítlan livifót.

Skuldnari kann við avtalu gjalda tann ikki eftirgivna partin av skuldini í avdráttum ella við einum eingangsgjaldi.

Stk. 6:
Eftir nr. 2 kann talan vera um, at skuldnari yvir longri tíð letur vera við at gjalda, ella á annan hátt misheldur skyldur sínar, hóast hesin hevur umstøður og møguleika fyri at gjalda við egnari peningaligari ogn o.a..

Er tað harafturímóti ein samfelagslig broyting, ein vanlig kreppa innan fakið, umskyldulig teknisk óhapp ella sjúka, ið er orsøk til mishald, er hetta ikki úrslit av grovari tilsíðissetan av skyldunum, og eftirgevingin má tískil standa við. Seinkan í nakrar fáar dagar við einum avdrátti, kann heldur ikki skiljast sum ein grov tilsíðissetan av skyldunum. Tað má bæði hyggjast eftir, hvussu umfatandi mishaldið er, og hvørjar orsøkirnar eru til hetta.

Stk. 7:
Útsetilsi kann loyvast í førum, har tað ikki er fullgott grundarlag fyri eftirgeving, men har tørvur er á lagaligari treytum. Er tað serliga stór óvissa um, hvussu peningaligu viðurskiftini hjá skuldnara vilja forbetra seg innanfyri tey næstu árini, kann hetta tala fyri at fráboða skuldnara útsetilsi við gjaldingini heldur enn eftirgeving.

Rentufrítøkan við lutvísari eftirgeving verður ikki at nyta við útsetilsi av gjalding eftir hesum reglum.

Stk. 8:
Henda regla skal umsitast heilt avmarkað og verður at nyta í førum, har staðfest verður, at feilur er gjørdur av myndugleikanum, talan er um force majeure ella force majeure líknandi umstøður.

Stk. 9:
Av hesi reglu er fevnd eftirgeving av skuld, grundað á umsitingarliga kostnaðarmiklar byrður. Hesar skuldir kunnu, á sama hátt sum eftirgeving annars, leggjast fram til støðutakan hjá myndugleika, ið hevur heimild til at eftirgeva skuld. Tá mál verður lagt fram til eftirgeving/striking, skal dentur leggjast á alduriin á krøvunum, umstøðurnar tá kravið uppstóð, møgulig kostnaðarmeting frá umsitingini av málinum higartil. Hartil skal serligur dentur leggjast á, um talan er um lítla peningaliga upphædd. Talan skal sostatt vera um smærri krøv.

Umsitingin kann leggja edv-listayvirlit við sum skjal, og kann flokka krøvini eftir felagslýsing av krøvum, ið bera eins tekin. Í flestum førum skulu peningakrøv lýsast á fullgóðan hátt og í øllum førum er meginreglan, at eftirgeving/striking bert kann fara fram, um samlaða kravið verður skjalprógvað. Er talan um, at fleiri krøv hvíla á einum og sama skuldnara, so skal samlaða kravið uppgerast og hvørt sær vísa skuld og tilskrivaða rentupartin. Um einki skjalprógv er fyri, at peningakrøvini eru málsviðgjørd, t.d. at áminningar um skuld ikki eru sendar út, verður ongin eftirgeving játtað.

Tað hevur leingi verið ynskiligt at sleppast kann undan við áhaldandi at hava smærri peningakrøv hangandi í kervinum, har bert rentutilskriving økir mundandi um umsitingarligt byrðumi. Við hesum skal gerast møgu-

ligt at upprunakrav kann eftirgevast/strikast og at tann rentutíðskrivaði parturin somuleiðis fellur burtur, tá høvuðskravið verður eftirgivið/strikað.

Stk. 10:
Heimild til eftirgeving av skuld o.a. liggur hjá Toll- og Skattaráð Føroya og tiknar avgerðir eru fyrisitingarliga endaligar.

Áðrenn støða kann takast til eftirgeving o.a. er umráðandi, at fullgott skjalprógv er fingið til vega, fyri at lýsa øll viðurskifti, ið dentur skal at leggjast á sambært hesi grein. Umsókn, ið ikki lýkur krøv til skjalprógv í seinasta lagi samstundis við at henda verður innlatin, skulu avvísast uttan viðgerð av málinum.

Toll- og Skattstova Føroya kann veita ráðgeving, áðrenn umsókn verður latin inn. Umsókn verður stílað til Toll- og Skattaráð Føroya.

Viðvíkjandi viðgerð av málinum í ráðnum verður meginreglan tann, at tað hvørki verður høvi hjá Toll- og Skattstovu Føroya, skuldnara ella nøkrum øðrum, til at koma á fund fyri at úttala seg í tílíkum málum. Hetta fyri at tryggja, at øll viðurskifti á fullgóðan hátt verða lýst skrivliga, og hartil fyri at tryggjað, at ráðið ikki á nakran hátt verður ávirkað í síni støðutaku. Sera umráðandi er, at fullgóð trygd kann fáast fyri, at avgerðir í slíkum álvarsomum málum hvíla á saktigum og óheftum grundarlag.

Tað kann gerast neyðugt hjá ráðnum at útvega sær serkøna hjálp og dentur verður tá at leggja á, at ráðgeving verður givin sum óheft faklig ráðgeving.

Stk. 11:
Ráðið kann biðja Lógardeildina í Toll- og Skattstovu Føroya, Stýrinum um, at gera eitt tilmæli í málum um eftirgeving. Tilmælið skal hvíla á eina reint løgfrøðiliga meting av málinum, í tráð við tey settu krøvini í hesi grein.

1. viðgerð miðvikudagin 18. mars 1998. Uppskotið beint í fíggjarnevndina.

Málið fall burtur sbr. stýrisskipanarlógini § 15 stk. 3, tí at løgtingsval var 30. apríl 1998, og málið ikki var liðugt viðgjørt í tingi fyri valið.

F.L. j.nr. 2530-1/90

144 Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um stuðul til menning av fiskivinnu á landi

Ár 1998, hósdagin 5. mars, legði John Petersen, landsstýrismaður, vegna landsstýrið fram soljóðandi

Uppskot
til
løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um stuðul til menning av fiskivinnu á landi

§ 1.

Í løgtingslóg nr. 84 frá 28. mai 1996 um stuðul til menning av fiskivinnu á landi, sum broytt við løgtingslóg nr. 110 frá 13. juni 1997, verða hesar broytingar gjørdar:

1) Í kapittul 1 verður yvirskriftin orðað soleiðis: "Virking av vørum úr innfluttum fiski".
2) Í § 1 verður sum nýtt stk. 4 sett:
"Stk. 4. Undrunt tann stuðul, sum er ásettur í stk. 2, hevur landsstýrið heimild til at lata ein eyka stuðul til virki, sum av nýggjum fara undir framleiðslu av innfluttum fiski á plássum, har slík framleiðsla ikki er frammanundan. Hesin stuðul kann vera upp til 50 oyru/kg og skal avmarkast til at vara í eitt ár frá tí, framleiðslan byrjar."
3) Í § 2 verður stk. 4 strikað.
4) Í kapittul 2a verður yvirskriftin orðað soleiðis: "Stuðul til menning av innaneftirliti"
5) Í § 4a, stk. 2 verður litra b orðað soleiðis:
"b) útreiðslur til innanhýsis skeið, upplæring, o.l."
6) Í § 4c verða stk. 2 og stk. 3 strikað, og stk. 4, sum verður stk. 2, verður orðað soleiðis:
"Stk. 2. Treytin fyri stuðli smb. §§ 4a og 4b er, at løgd verður fram útgreinað frágreiðing um verkætlanina, tíðarætlan og kostnaðarætlan."
7) Eftir § 4d verður sum nýtt kapittul 2b sett:

"Kapittul 2b
Stuðul til at lúka ES-krøv

§ 4e. Landsstýrismanninum í fiskivinnumálum verður heimilað av játtan á fíggjarløgtingslógini at veita fiskavirkjum stuðul til tær broytingar og ábøtur á virkið, ið eru neyðugar fyri at virkið kann varðveita løggildingina eftir teimum krøvum, ið eru/verða sett fram av Heilsufrøðiligu Starvsstovuni samhæld vegleiðing um ES-góðkenning.
Stk. 2. Játtast kann stuðul við upp til 25% av kostnaðinum av broytingum og ábótum.

§ 4f. Stuðul verður veittur eftir umsókn. Landsstýrismaðurin í fiskivinnumálum kann í kunngerð áseta nærri reglur hesum viðvíkjandi og treytir fyri veitan av stuðli."

§ 2.

Henda lóg kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

Almennar viðmerkingar

Lógaruppskotið fevnir um nakrar tekniskar broytingar í lógini fyri at sleppa undan tulkingartrupulleikum, sí nr. 1), 2), 3), 4) og 6). Harafturat fæst heimild at veita stuðul innanhýsis skeið, sí nr. 5) og stuðul til at lúka ES-krøv, sí nr. 7)

Landsstýrismaðurin í fiskivinnumálum fær við hesum lógaruppskoti, sí nr. 7), heimild at veita fíggjarligan stuðul til fiskavirkir til tær broytingar og ábøtur, ið eru neyðugar, fyri at virkið kann varðveita løggildingina og lúka ES-krøv. Heilsufrøðiliga Starvsstovan hevur í mars 1996 gjørt eina vegleiðing til virkini um, hvørji krøv skulu vera uppfylt, fyri at Starvsstovan kann løggilda virkini eftir ES-krøvum. Hesi krøv eru munandi hørd eftir at fólk úr ES vóru á eftirlitsvitjan í Føroyum í september 1995.

Við nr. 5) fær landsstýrismaðurin í fiskivinnumálum heimild at stuðla fiskavirkjum til lønarútreiðslur í sambandi við innanhýsis skeið á fiskavirkjum í samband við menning av innaneftirlitsskipanum.

Í fíggjarlógini fyri 1998 er játtanin á høvuðskonto 5.34.4.16 "Fiskivinnumenning á landi" 12 mió. kr., og verður hendu at býta millum stuðul til innfluttan fisk (kapittul 1), stuðul til vørumenning (kapittul 2) og síðani stuðul til at lúka ES-krøv (kapittul 2a). Ongar neyvar metingar finnast um, hvat tað kemur at kosta virkjunum at gera neyðugar broytingar og ábøtur til tess at uppfylla ES-krøvini.

Viðmerkingar til tær einstøku broytingarnar

Viðv. 1) Yvirskriftin í kapittul 1 er: "Virking av vørum úr fiski", men umfatar bara innfluttan fisk. Tí verður yvirskriftin broytt til "Virking av vørum úr innfluttum fiski".

Viðv. 2) og 3) Í § 2 er sett inn eitt stk. 4, sum umrøður stuðul til innfluttan fisk, hóast § 2 umrøður stuðul til vørumenning. Tí verður hetta stykkið flutt til § 1, ið umrøður innfluttan fisk.

Viðv. 4) Yvirskriftin í kapittul 2a er: "Stuðul til menning". Eftirsum kapittulin umrøður stuðul til menning av innaneftirliti, verður yviskriftin broytt til "Stuðul til menning av innaneftirliti".

Viðv. 5) § 4a, stk. 2, litra b er orðað soleiðis *"Stuðul kann latast til útreiðslur til innanhýsis skeið, upplæring o.l., tó ikki til lønir ella aðra samsyning til egin starvsfólk í tíðini fyri skeiðluttøku, upplæring o.l."* Hetta verður nú broytt, so heimild fæst at stuðla lønarútreiðslur í samband við innanhýsis skeið á fiskavirkjum í samband við menning av innaneftirlitsskipanum. Um øll starvsfólk á fiskavirkjum fara á skeið 2 dagar í einum ári, og stuðulin verður helvtin av útreiðslunum, verður kostnaðurin av hesum uml. 1 mió. kr. um árið. Stuðulin verður tó tillagur samlaðu játtanini og tal av umsóknum, ið eru innkomnar, tá tíðarfreisin fyri at søkja er farin.

Viðv. 6) § 4c, stk. 2 umrøður, at tíðarfreistin fyri umsóknir um stuðul er 1. august. Mett verður, at landsstýrismaðurin í fiskivinnumálum í kunngerð eigur at áseta eina tíðarfreist fyri umsóknum, heldur enn at lata hesa áseting vera í lógini. Í flestu førum er tað ein fyrimunur, at ein møgulig freist er fyrr enn 1. august.

§ 4c, stk. 3 umrøður tey virkir, sum ikki eru kunnaði um krøvini frá Heilsufrøðiligu Starvsstovuni innan 1. juli 1997. Henda greinin bevir ongan praktiskan týdning longur, tí nú eri øll virkini kunnaði um krøvini.

§ 4c, stk. 4, litra b umrøður hvørjar upplýsingar, skulu latast landsstýrismanninum í fiskivinnumálum, eftir at tiltakið er liðugt. Mett verður, at í teimum førum, har landsstýrismaðurin ynskir at fáa upplýsingar um hvussu stuðulin er nyttur, eigur hetta heldur at vera ásett sum treyt í játtanini, og tí verður litra b) strikað.

Viðv. 7) Nýtt kapittul verður sett inn sum kapittul 2b "Stuðul til at lúka ES-krøv".

Í § 4e, stk. 1 fær landsstýtismaðurin í fiskivinnumálum heimild at veita fiskavirkjum stuðul til tær broyting ar og ábøtur á virkið, ið eru neyðugar fyri at virkið kann varðveita løggildingina eftir teimum krøvum, ið eru/verða sett fram av Heilsufrøðiligu Starvsstovuni sambært vegleiðing um ES-góðkenning. Verandi vegleiðing er frá mars 1996 (FVD.03.1996). Her verður hugsað um tey "fysisku krøvini", við tað at kapittul 2a umfatar stuðul til menning av innaneftirliti.

Í § 4e, stk. 2 verður ásett, at játtast kann stuðul við upp til 25% av kostnaðinum av broytingum og ábótum. Mett verður, at stuðulin ikki eigur at vera størri, við tað at hetta eru kostnaðarmiklar broytingar, og fyri at so nógv virkir sum møguligt kunnu fáa part í stuðulinum. Stuðulin verður annars tillagaður samlaðu játtanini og tal av umsóknum, ið eru innkomnar, tá tíðarfreisin fyri at søkja er farin.

Í § 4e, stk. 3 verður ásett, at fiskavirkir, sum almennir grunnar eiga ella sum hava fingið tilført kapital úr almennum grunnum, og fiskavirkir, sum hava fingið almennan stuðul til at lata upp aftur, kunnu ikki fáa stuðul sambært stk. 1 og stk. 2.

Í § 4f verður ásett, at stuðul verður veittur eftir umsókn, og at landsstýrismaðurin í fiskivinnumálum kann í kunngerð áseta nærri reglur hesum viðvíkjandi og treytir fyri veitan av stuðuli. Hesar reglur fara at m.a. innihalda, at í umsóknini skal vera tíðarætlan, yvirlit yvir broytingar og ábøtur og vísast skal á hvat serstakt ES-krav ger hesar neyðugar, kostnaðarmeting v.m. Í treytunum fyri veitan av stuðuli verður m.a. sett, at virkið skal varðveita løggildingina sambært treytunum fyri ES-góðkenning. Harafturat verður ein tíðarfreist fyri at søkja sett í kunngerðina.

Ongar neyvar metingar finnast um hvat tað kemur at kosta virkjunum at gera neyðugar broytingar og ábøtur til tess at uppfylla ES-krøvini. Á summri 1996 metti Føroya Arbeiðsgevarafelag kostnaðin til 60 mió. kr., og umfatað hetta øll fiskavirkir í landinum. Stuðulin verður tillagaður játtanini á fíggjarlógini og tal av umsóknum, ið eru innkomnar, tá tíðarfreisin fyri at søkja er farin.

Málið fall burtur sbr. stýrisskipanarlógini § 15 stk. 3, tí at løgtingsval var 30. apríl 1998, og málið ikki var liðugt viðgjørt á tingi fyri valið.

KL. j.nr. 1525-1194

145 Uppskot til løgtingslóg um eftirgeving av ella gjaldsskipan fyri skuld til landskassan

Ár 1998, hósdagin 5. mars, legði Anfinn Kallsberg, landsstýrismaður, vegna landsstýrið fram soljóðandi

Uppskot
til
løgtingslóg um eftirgeving av ella gjaldsskipan fyri skuld til landskassan

§ 1. Landsstýrismanninum í fíggjar- og búskaparmálum verður heimilað heilt ella lutvíst at eftirgeva skuld av vinnuvirksemi til landskassan stavandi frá landskassalánum og aftursóknarkrøvum av goldnum landskassaborganum ella at gera gjaldsavtalur.

§ 2. Treytin fyri at skuldari er umfataður av § 1 er, at trygd landskassans er burtur heilt ella lutvíst eitt nú við tvingsilssølu, ella á annan hátt.

§ 3. Landsstýrismaðurin í fíggjar- og búskaparmálum tilnevnir 3 mannanevnd mannað av fólki, sum hava umsitingarligt, fíggjarligt og løgfrøðisligt innlit til at geva fíggjarmálastýrinum ummæli samb. hesi lóg.

§ 4. Landsstýrismaðurin í fíggjar- og búskaparmálum ásetur í kunngerð nærri reglur og krøv til skjalprógv og annað til tess at útinna hesa lóg.

§ 5. Henda lóg kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

Almennar viðmerkingar

Sambært lóg nr. 28 frá 30. apríl 1987 var heimild fyri eftirgeving av skuld bæði afturá eina tvingsilssølu, og uttan at gjøgnumføra eina tvingsilssølu, tá ikki útlit vóru fyri at skuldin varð afturgoldin heilt ella partvíst. Eisini kundi eftirgeving fara fram, tá landskassin einki veð hevði fyri skuldini.

Víst verður til viðmerkingarnar í Løgtingstíðindi frá 1986 síðu 378 ff løgtingsmál nr. 73/1986.

Men við løgtingslóg nr. 110 frá 21. mai 1993 fór henda úr gildi.

Í viðmerkingunum í Løgtingstíðindi frá 1992 síðu 788 løgtingsmál nr. 159/1992 sæst, at orsøkin til at lógin fór úr gildi var, at reglurnar um skuldarumskipan (gældssanering) vóru settar í gildi í Føroyum í 1989, og at rættast tí var at avtaka lógina frá 1987.

Tað vísur seg, at hóast vit hava reglur um skuldarumskipan, so eru hesar ikki nógv nyttar av føroyingum, hóast nógv ivaleyst líka treytirnar. Orsøkin er møguliga, at hetta er ein skipan, sum almenningurin fær kunnleika til, og tí ikki ein skipan sum fellur føroyingum lætt.

Eisini eru dømi uppá at fólk ikki koma ígjøgnum við tí almennu skuldarumskipanina, tí einki inntøkugrundarlag er.

Landsstýrið heldur, at møguleikar skulu vera at sanera skuld uttan at noyða fólk gjøgnum tað almennu skuldarumskipanina.

Tað hevur vist seg við innheiming av landskassaskuld, at skuldarin ofta hevur fingið skipaði viðurskifti við peningastovnar, men landskassaskuldin stendur eftir, tí ivi hevur tikið seg upp um heimildina fyri at eftirgeva skuld.

Møguleiki eigur eisini at vera fyri at gera skipanir saman við øðrum kreditorum.

Tað vísir seg at vera tørvur fyri heimild at eftirgeva skuld hjá einstaklingum, sum hava mist sína vinnutól, har landskassin hevur ein ágóða stavandi frá láni ella sum borgsonaður. Ein skipan eigur at fáast til vega, soleiðis at landskassin kann viðgerða eitt mál út frá sjónarmiðunum sum kravánarí og at fáa peningaliga sum best burturúr í staðin fyri í nógvum førum katiska einki, tí eingin heimild er at gera nakað.

Tað tænir ongum endamáli at lata landskassaskuldina standa við kanska heilt til eitt deyðsbúgv, tí tá verður uttan iva talan um eitt deyðsfrágongubúgv, og eingin peningur fæst álíkavæl.

Tað kann vísa seg, at hóast skuldarin ikki sjálvur er førur fyri at útvega eina peningaupphædd til eina akkord, so kunnu útvegir finnast fyri at útvega eina peningaupphædd frá familju og vinum til eina akkordavtalu. Men henda motivatión til at útvega nakað av peningi er ikki til, tá landskassin ikki metir seg hava nakra heimild til at gera nakra avtalu.

Viðmerkingar til tær einstøku greinirnar

Til § 1. Heimild verður fyri heilt at eftirgeva skuld ella at gera akkordir, soleiðis at partur verður eftirgivin, móti at restin verður goldin. Eisini kunnu gjaldsavtalur gerast, bæði við partvísari avskriving og ongari avskriving, sum hóska til førleikan hjá skuldaranum .

Til § 2. Talan kann vera um, at landskassin hevur mist veðrættin við tvingsilssølu. Ella at við eini eftirfylgjandi innheinting er veðfúttøka tikin í fastogn ella neyðugt vinnutól, men at veðið bert partvíst liggur innan fyri frívirðið, og tá kundi akkord verið gjørd svarandi til frívirðið og restin eftirgivin. Veðið kann eisini liggja heilt uttan fyri frívirðið.

Hugsast kann eisini at partur av avtaluni verður, at veðið verður standandi tinglýst í ongini, sjálvt um einki frívirði í løtuni er.

Til § 3. Áðrenn Fíggjarmálastýrið tekur støðu, skal sakkøn 3-mannanevnd geva ummæli.

Til § 4. Uppskot til kunngerð verður lagt við.

UPPSKOT TIL KUNNGERÐ UM EFTIRGEVING AV ELLA GJALDSSKIPAN FYRI SKULD TIL LANDSKASSAN.

Við heimild í § 4 í løgtingslóg nr. frá 1998 um eftirgeving av ella gjaldsskipanfyri skuld til landskassan verður ásett:

§ 1

Umsókn um eftirgeving av skuld til landskassan ella um gjaldsavtalu verður send Føroya Gjaldstovu, sum tetur nevndini samb. § 3 í lág nr. frá 1998 umsóknina til ummælis.

§ 2

Tey fyrilit, sum eiga at verða havd viðgerðini av ummælinum, eru m.o.:

- um skuldarin hevur givið insolvensvártan í fútarættinum
- um skuldarin ikki eigur ognir við frívirðum ella at hesi virðir eru avmarkaði
- at hann er komin so væl til árs, at hann ikki kann væntast at verða í lønandi vinnu longi afturat.ár
- at hann er óarbeiðsførur t.d. avlamin
- at skuldin er so stór fyri skuldaran, at ikki er útlit til, at hon verður afturgoldin.

§ 3

Nevndin, sum ummælir umsóknini, kann krevja nærri upplýsingar, skjalprógv og váttanir, um tað verður mett neyðugt til tess at viðgerða umsóknina.

§ 4

Henda kunngerð kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

Tórshavn, tann / 1998.

Annfinn Kallsberg (sign), landsstýrismaður

VIÐMERKINGAR TIL KUNNGERÐINA:

§ 2 Nevndin skal tryggja sær dokumentatión fyri, at best møguligt fíggjarligt úrslit fæst fyri landskassan.

Skuldarin kann hava møtt í fútarættinum og har undir revsiábyrgd givið insolvensváttan. Ella at dokumentatión á øðrum grundarlagi er fyri, at skuldarin ikki eigur frívirðir.

Talan kann eisini verða um skuldara, sum er komin so væl til árs, at hann er í sínum seinastu arbeiðsføru árum, er pensionistur, avlamnispensionistur, at tað kann tykjast tyngjandi at halda fast við eitt krav.

UPPSKOT TIL VÁTTAN.

Í samband við avtalu millum undirritaða og Føroya Landsstýri/Føroya Gjaldstovu vátti eg við hesum undir trú og heiður, at teir upplýsingar eg havi latið gjaldstovuni í sambandi við málsviðgerðina eru rættir og geva eina rætta og fullgóða mynd av fíggjarligu støðu míni.

Sostatt kann eg vátta:

- at gjaldstovan hevur fingið allar upplýsingar um ognir mínar tað veri seg fastar ognir, leysafæ, reiðan pening og aðrar ognir, sum eg eigi ella havi ræði á.

- at eg ikki havi fallnan arv í væntu

- at gjaldstovan hevur fingið allar upplýsingar um møguligar gávur seinastu tvey árini, og at eg ikki aðramáta havi framt dispositiónir til skaða fyri landskassan.

Somuleiðis vátti eg at vera kunnaður um, at landsstýrið/gjaldstovan kann seta úr gildi avtaluna, um so er, at upplýsingar mínir um mína fíggjarligu støðu ikki eru rættir.

, tann /

1. viðgerð mikudagin 18. mars 1998. Uppskotið varð beint í figgjarnevndina.

Málið fall burtur sbr. stýrisskipanarlógini § 15 stk. 3, tí at løgtingsval var 30. apríl 1998, og málið ikki var liðugt viðgjørt á tingi fyri valið.

F.L.j.nr. 2580-25/98

146 Staðfesting av STCW-F sáttmálanum um útbúgving, sjóvinnu og vaktarhald fyri manning á fiskiskipum

Ár 1998 hósdagin 5. mars, legði Eilif Samuelsen, landsstýrismaður, vegna Edmund Joensen, løgmann, vegna landsstýrið fram soljóðandi

Uppskot
til
samtyktar

Løgtingið samtykkir, at Føroyar taka undir við danskari staðfesting av "Altjóða sáttmálanum um útbúgving, sjóvinnu og vaktarhald fyri manning á fiskiskipum, 1995", STCW-F sáttmálin frá 7. juli 1995.

Viðmerkingur
Sum fylgja av, at Føroyar hava staðfest handilsskipasáttmálan (í 1990) og sum eina fyrireiking til staðfesting av fiskiskipasáttmálanum, setti landsstýrismaðurin í sjóvinnumálum í januar 1997 ein arbeiðsbólk, við tí endamáli, at koma við uppskotum til neyðugar broytingar í manningar-, sjóvinnu-, sjómans- og mynstringarlógini.

Nevndin skuldi eisini viðgera nýggja fiskiskipasáttmálan og geva landsstýrinum tilmæli um, hvørt tað í manningar- og sjóvinnulógini í størri mun skuldi skiljast ímillum fiski- og handilsskip, tá hesi skulu uppfylla nevndu sáttmálar.

Nevndin hevur viðgjørt ásetingarnar í tí nýggja fiskiskipasáttmálanum STCW-F. Hesin sáttmáli hevur linari krøv enn handilsskipasáttmálin. Tá talan er um kravt tal av manning umborð verður víst til manningarskjalið hjá hvørjum skipi sær, sum er ásett av Sjóvinnufyrisitingini. Manningartalið kann broytast umsitingarliga uttan at hetta grípur inn í ásetingarnar í STCW-F sáttmálanum.

Hinvegin ásetur sáttmálin m.a. førleikakrøv til manning umborð á skipum yvir eina ávísa stødd.

Nevndin hevur ikki viðgjørt spurningin um útbúgvingar, sum annars er ein týðandi partur av báðum sáttmálunum. Hetta økið liggur undir landsstýrismanninum í undirvísingarmálum.

Nevndin mælir til, at sjómansútbúgvingarnar og skeiðvirksemi verða dagførd skjótast gjørligt og í seinasta lagi 1. august 1998, sum er sáttmálakrav.

Nýggi fiskiskipasáttmálin STCW-F - ein samandráttur

Alment um sáttmálan
Sáttmálin, ella konvensjónin, um útbúgving, sjóvinnu og vakturhald fyri manning á fiskiskipum, STCW-F sáttmálin (International Convention on Standards of Training, Certification and Watchkeeping for Fishing Vessel Personnel) bleiv gjørdur á einari stjórnarráðstevnu í altjóða havfelagsskapinum IMO (International

Maritime Organisation) í juli 1995. Sáttmálin liggur nú til undirskrivingar hjá limalondunum. Fyri at sáttmálin skal kunna koma í gildi altjóða, skulu í minsta lagi 15 lond taka undir við honum. Fyribils er undirtøkan ikki komin upp á 15, men roknast kann við, at hetta verður í næmasta framtíð. Í IMO verður eisini arbeitt við at gera eina nágreiniligari vegleiðing til, hvussu úthúgvingarnar skulu fyriskipast og hvat innihaldið í hesum skal vera. Hetta er nakað, sum serliga menningarfondini, hava fyri neyðini at fáa greiðu á, áðrenn tey taka undir við sáttmálanum.

Danmark kemur at taka undir við sáttmálanum og mælt verður til at sáttmálin eisini fær gildi fyri Føroyar. Føroyar uppfylla tó krøvini á flest øllum økjum í sáttmálanum longu í verandi lóggávu. Kravið um trygdarskeið til sjófólk við fiskiskipum skal setast í lógina og ásetingin um átekning á sjóvinnubrøv sambært STCW-F skal eisini ásetast í lógina fyri at kunna uppfylla allan sáttmálan.

Sáttmálin er í høvuðsheitum bygdur upp sum handilsskipasáttmálin við greinum, ískoytisskjølum, fylgiskjølum og tilmælum (hetta kann samanberast við lóg, kunngerð, rundskriv og tilmæli).

Í greinunum er tað meira yvirordnaða ásett, meðan í ískoytisskjølunum eru ásetingarnar meira nágreinaligar. Í fylgiskjølunum verður m.a. víst, hvussu eitt ávíst prógv, t.d. sjóvinnubrev skal síggja út.

Har altjóða semja ikki fæst um eina ávísa áseting, kann hetta ístaðin gerast sum ein neyðloysn í einum tilmæli. Limalondini kunnu so sjálvi nyta tilmælini sum grundarlag í egnari lóggávu.

Greinirnar í STCW-F sáttmálanum
15 greinir eru í sáttmálanum. Hesar áseta fylgjandi:

- Sáttmálin er galdandi fyri manning á fiskiskipum.

- Fyri at góðkenna og innføra sáttmálan skal egin lóggáva tryggja, at sáttmálin verður fylgdur.
  (Viðmerkjast kann, at sáttmálin ásetur bert minstakrøv. Einki er til hindurs fyri í egnari lóggávu at seta støðri krøv enn sáttmálin setir).

Egin lóggáva skal eisini umfata reglur um møgulig brot á sáttmálan.

Heimild er givin til at hava eftirlit við fremmandum fiskiskipum, tá ið hesi koma í havn hjá einum limalandi.

Eftirlitið umfatar í høvuðsheitum bert kravd sjóvinnubrøv, sambært sáttmálanum.

Heimild er at afturhalda skipi, um manningin ikki hevur gild sjóvinnubrøv ella tað við vissu kann sigast, at manningin ikki er skikkað til at føra skipið. Skipið kann eisini aftirhaldast, um tað verður staðfest, at følsk sjóvinnubrøv eru umborð.

- Limalondini binda seg til at veita hvørjum øðrum stuðul fyri at gjøgnumføra sáttmálan.

- Sáttmálin kemur í gildi altjóða 12 mánaðir eftir, at 15 limalond hava tikið undir við honum. Sáttmálin kann uppsigast við 5 ára freist.

Ískoytisskjøl
Sum nevnt omanfyri eru ásetingarnar í hesum parti ein nágreinilig útgreinan av teimum ásetingunum, sum eru í greinunum.

Ískoytisskjølini til sáttmálan eru býtt upp í 4 kapitlar:

Kapittul 1. Almennar fyriskipanir
Sjóvinnumyndugleikarnir skulu átekna eitt útlendskt sjóvinnubrævi, fyri at viðkomandi kann fáa rættindi at gera tænastu umborð á skipum, sum føra flagg hjá teimum.

Sjóvinnubrøv til maskinmanning, sum útgivin eru eftir STCW-78 sáttmálanum, (handilsskipasáttmálanum) hava fult gildi til fiskiskip.

Kravd loyvisbrøv koma undir eftirlit í fremmandari havn. Undantaksloyvir verða góðtikin.

Sterkar grundir skulu til, fyri at kunna afturhalda einum skipi.

Um mett verður, at manningin ikki er før fyri at røkja sínar uppgávur, tí at teir m.a. hava følsk sjóvinnubrøv ella sertifikatir, hava víst vandamikla atburð (at skip hava rent á land, eru strandað ella havt samanstoyt) ella ikki hava neyðug loyvisbrøv ella undantaksloyvi, kann skipið afturhaldast, til viðurskiftini eru komin í rættlag.

Tað áliggur limalondunum at veita neyðugar upplýsingar til aðalskrivaran í IMO.

Aðalskrivarin veitir eftir umsókn upplýsingar til Itmalondini.

Tað er eisini skylda hjá limalondunum at hava eina kompetenta umsiting, sum umsitur loyvisbrøv (sjóvinnubrøv).

Sjóvinnumyndugleikarnir skulu hava fult yvirlit yvir øll givin loyvir, átekningar og ógildað loyvir.

Limalondini skulu, áðrenn átekning, tryggja sær, at viðkomandi lykur treytirnar í sáttmálanum.

Loyvisbrøv, sum eru útgivin av einum ikki-limalandi, kunnu ikki fáa áteknings smb. sáttmálanum.

Útlendingur við einum STCW-F sjóvinnubrævi kann sigla upp til 3 mánaðir við ongari STCW-F átekning. Eftir hetta skal hesin hava eina átekning frá myndugleikunum á staðnum.

Loyvisbrøv, ella sjóvinnubrøv, sum útgivin eru eftir egnari lóggávu, áðrenn sáttmálin kom í gildi, hava somu rættindi eftir, at hendan er innført.

Inntil 5 ár eftir at sáttmálin er settur í gildi, kunnu gomul loyvisbrøv skrivast, men bert til teir, sum hava byrjað viðkomandi skipstænastu áðrenn sáttmálin kom í gildi.

Undantaksloyvir til yvirmenn kunnu gevast í upp til 6 mánaðir hvørja ferð.

Undantaksloyvir kunnu bert gevast til teir, sum hava sjóvinnubrævi, sum er eitt slig lægri enn kravda sjóvinnubrævi.

Limalondini kunnu skipa fyri alternativari undirvísing og ástøðiligari uppvenjing.

Treytin fyri hesum er, at viðkomandi fær eina útbúgving, sum ikki er á lægri støði enn sáttmálin krevur.

Kapittul 2. Sjóvinnubrøv til skiparar, stýrimenn, maskinyvirmenn og radiopassarar
a. Skiparar á fiskiskipum 24 m ella størri í sigling uttanfyri vart sjóøki.

Viðkomandi skal hava siglt sum stýrimaður í minsta lagi 12 mánaðir á skipum 24 m ella størri, ella sum

skipari á skipum millum 12 m og 24 m. 6 av hesum kravdu mánaðunum kunnu vera fingnir umborð á handilsskipum.

b. Stýrimenn á fiskiskipum 24 m ella størri í sigling uttanfyri vart sjóøki.

24 mánaða dekkstænasta á fiskiskipum 12 m ella størri. 12 av hesum mánaðunum kunnu vera fingnir á einum sjóvinnuskúla ella umborð á einum handilsskipi (treytað av útbúgvingarbók).

Fyri bæði stýrimann og skipara er galdandi, at viðkomandi skal hava heilsuprógv og sjónar- og hoyrnarroynd.

c. Sjóvinnubrøv til maskinstjóra og 1. meistara á skipum við maskinorku á 750 kW ella størri.

Maskinstjóri: 24 mánaða maskinstænasta umborð á skipum. 12 av hesum kravdu mánaðunum skal viðkomandi hava virkað sum 1. meistari.

1. meistari: minst 12 mánaða maskinstænasta umborð á skipum, 6 av hesum kravdu mánaðunum kunnu verða fingnir á annan fullgóðan háttur sum er góðkent av sjóvinnumyndugleikanum.

Umframt heilsuprógv og aldursmark uppá 18 ár, verður krav góðkent brandskeið.

d. Sjóvinnubrøv til radiopassarar.

Ásetingarnar í hesum parti eru galdandi fyri persónar, sum hava radiotænastu umborð á skipum, sum skulu hava GMDSS-útgerð eftir egnari lóggávu ella altjóða samtyktum.

Er GMDSS-útgerð ikki kravd umborð, skal viðkomandi, sum hevur radiotænastu, uttan mun til ásetingina í hesum parti, lúka treytirnar, sum settar eru í "Radio Regulations", og hava prógv fyri hesum.

e. Viðlíkahald av vitan og førleika: deks- og maskinyvirmenn.

Fyri at sjóvinnubrøv framhaldandi skal vera galdandi eftir 5 ár, skal viðkomandi hava
- siglt í minsta lagi 1 ár 5 tey seinastu árini,
- hava gilduga sjónar- og hoyrnarroynd. ella hava
- staðið eina góðkenda roynd. ella
- hava siglt í minsta lagi 3 mánaðir sum yvirmaður í einum starvi, sum er útyvir kravdu manningarásetanina bert framman undan nettindini verða givin aftur.

f. Viðlíkahald av vitan og førleika. GMDSS-radiopassarar.

Fyri at varðveita nettindini skulu radiopassarar í minsta lagi hava
- 1 úra skipstænastu innanfyri 5 tey seinastu árini, sum m.a. umfatar radiotænastu. ella
- hava staðið eina viðkomandi roynd.

Limaløndini skulu tryggja sær, at radiopassararnir fáa neyðugu vitan og upplæring, so hvørt sum nýggj radioútgerð verður kravd umborð.

Álagt er limaløndunum at veita skipum allar broytingar í altjóða samtyktum innan radiosamskifti.

<u>Kapittul 3. Trygdarskeið til manning umborð á fiskiskipum</u>

a. Ein og hvør, sum fer til skips fyrstu ferð, skal hava staðið góðkent trygdarskeið innan fylgjandi økir:

- Upplæring í at yvirliva, herundir at læra seg í bjargingarvest v.m.,
- At fyribyrgja og sløkkja eld
- Neyðskipanir
- Fyrstahjálp
- at fyribyrgja dálking á sjónum, og
- at fyribyrgja skipsvanlukkum.

b. Limalondini kunnu sjálvi avgera, í hvønn mun ásetingarnar skulu gulda persónar á smærri førum ella persónar, sum eru í vinnu, tá ið sáttmálin kemur í gildi.

Kapittul 4. Vaktarhald
Altjóða reglur um vaktarhald á fiskiskipum verða nú eisini settar í gildi. Føroysku reglurnar á økinum eru í kunngerð nr. 143 frá 20. oktober 1992 um vaktarhald á skipum.

Hjálagdur er STCW-F sáttmálin í danskari umseting: "International konvention om uddannelse, om sønæring og om vagthold for personel i fiskeskibe, 1995". (Sáttmálin burturúrlagdur løgtingstíðindum, víst verður til lovtidende C nr. 10 frá 1. februar 1985, nr. 66 frá 17.07.1989, nr. 128 frá 05.12.1991 og nr. 95 frá 17.08.1995.)

Málið fall burtur sbr. stýrisskipanarlógini § 15 stk. 3, tí at løgtingsval var 30. apríl 1998, og málið ikki var liðugt viðgjørt á tingi fyri valið.

F.L.j.nr.1620-12/98

147 Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um stuðul til útróðrarflotan undir 20 BRT

Ár 1998, hósdagin 5. mars, legði John Petersen, landsstýrismaður, vegna landsstýrið fram soljóðandi

Uppskot
til
løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um stuðul til útróðrarflotan undir 20 BRT

§ 1.
Í løgtingslóg nr. 140 frá 25. mai 1993 um stuðul til útróðrarflotan undir 20 BRT verður gjørd hendan broyting:
Í § 7 verður sett sum nýtt stk. 2:
"*Stk. 2.* Landsstýrinum verður heimilað í serligum førum, uttan at treytirnar í stk. 1 eru loknar, at gjalda lán ella part av láni, sum hava landskassaveðhald, og umleggja goldnu upphæddina til eitt rentu- og avdráttarfrítt lán, ið verður standandi í fiskifarinum og tryggja við veðrætti, treytað av, at eginpeningurin í fiskifarinum verður hækkaður við eini upphædd ásett av landsstýrinum ella at partur av lánunum verður rindaður av eigaranum. Sama er galdandi, tá talan er um eina av landskassanum goldna borgan. Rentu- og avdráttarfría lánið verður niðurskrivað eftir einum áramáli, ið verður ásett av landsstýrinum. Nevndin, ið er sett sambært løgtingslóg um umlegging av lánum v.m. hjá fjarfiskiflotanum, letur landsstýrinum ummæli av umsóknum sambært hesum stykki. Tað er ein treyt fyri umlegging, at fiskifarið ikki hevur rakstrarmøguleika at rinda skuldina, og at fiskifarið við umlegging verður mett at bera at klára seg í framtíðini."

§ 2.
Hendan lóg kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd. Samstundis verður danski teksturin í lógini strikaður.

Almennar viðmerkingar
Samlæst § 7 í løgtingslóg um stuðul til útróðrarflotan undir 20 BRT hevur landsstýrið heimild til undir ávísum treytum at niðurskriva lán í fiskifari við landskassaveðbaldi, í sama lutfalli, sum annar veðhavari niðurskrivar sítt lán. Henda heimild er bert nýtt í ógvuliga avmarkaðum mun.

Ein veikleiki við ásetingini í § 7, sum hevur víst seg, er, at tá talan bert hevur verið um 2 veðhavarar í skipinum, hevur trupuleikin verið at fáa tann fíggingarstovn, sum eigur 1. veðrætt at avskriva skuld, tí veðrætturin liggur innanfyri metta virðið av fiskifarinum.

Tað kann eisini viðmerkjast, at hetta uppskotið er innihaldsliga tað sama, sum varð samtykt av løgtinginum fyri feskfiskaflotan omman fyri 20 BRT, smb. løgtingsmál nr. 77/1996.

Fíggjarligar avleiðingar
Talan verður bert um fá skip, ið møguliga koma undir ásetingina. Trupult er tí at meta um, hvat fíggjarligi kostnaðurin verður.

Viðmerkingar til tær einstøku greinarnar
Að § 1. Talan verður bert um at nýta ásetingina í § 7, stk. 2 í serligum førum. Sum tað áður er nevnt, kann talan verða um, at bert tveir veðhavarar eru í fiskifarinum, og vil tí tann fremri veðhavarin náttúrliga ikki fara at niðurskriva skuld, um so er, at veðrætturin liggur innan fyri metta virðið av fiskifarinum.

Málið fall burtur sbr. stýrisskipanarlógini § 15 stk. 3, tí at løgtingsval var 30. apríl 1998, og málið ikki var liðugt viðgjørt á tingi fyri valið.

FL. j.nr. 1500 21/93

148 Uppskot til løgtingslóg um postvirksemi

Ár 1998, hósdagin 5. marts, legði Eilif Samuelsen, landsstýrismaður, vegna Ivan Johannesen, landsstýrismann, vegna landsstýrið fram soljóðandi

Uppskot
til
løgtingslóg um postvirksemi

Kapittul I.
Almennar reglur
Endamál

§ 1. Endamál lógarinnar er:

a) *at* hóskandi postflutningur verður tryggjaður øllum landsins íbúgvum.
b) *at* postflutningur verður skipaður fyri rímiligan prís við góðari dygd.
c) *at* verja áhugamál viðskiftafólksins, herundir serliga postloyndina.
d) *at* postflutningur verður lagaður eftir skiftandi tørvi.
e) *at* fortreytir verða skaptar fyri frælsari kapping.

Virkisøki
§ 2. Lógin er galdandi fyri vinnuligan postflutning.

Kapittul II.
Allýsingar

§ 3. Í hesi lóg merkir:
Postur: Eitthvørt brævi ella annur sending, ið vigar upp til 20 kg og sum landið sambært § 5 hevur skyldu til at tryggja flutning av.
Innskrivaður postur: Tænasta, sum veitir sendara einshátaða trygging móti vandanum fyri burtarmissi, stuldri og skaða og sum útvegar sendaranum prógv fyri, at hann hevur latið tann post ella at posturin er útflyggjaður móttakaranum.

Virðispostur: Tænasta, sum tryggjar sendaranum móti vandanum fyri burturmissi, stuldri og skaða á postin, fyri í mesta lagi virðið, hann hevur tilskilað. Postvinnurekandi: Hvør tann, ið rekur vinnuligan postflutning.

Postflutningur: Reglubundin tænasta, sum fevnir um innsavning, skiljing, flutning og útlygging av posti.

Adresserað brøv: Adresseraðar sendingar í afturlatnum brævbjálva ella líkari innbalding, sama hvat innihaldið er, og adresserað skrivlig boð við persónligum innihaldi, postkort íroknað.

Frímerki: Gjaldmiðil, útgivin av landinum ætlaður til gjald fyri postflutning og sum hevur áskriftina Føroyar.

Javningargjald: Gjald sum landsstýrið hevur rætt til at áleggja postvinnurekandi til tess at tryggja góðan postflutning um alt landið.

Kapittul III.
Einkarrættur og skyldur
Einkarrættur landsins

§ 4. Landið hevur einkarrætt til postflutning av innlendis adresseraðum brøvum og adresseraðum brøvum send úr Føroyum og til Føroya.

Stk. 2. Undantikin einkarrættinum er tó postflutningur av adresseraðum prístistum, bóklingum, bløðum og øðrum prentaðum sendingum, eins til innihalds, og sum eru í glærum bjálva.

Stk. 3. Landið hevur einkarrætt at geva út frímerki.

Stk. 4. Landið hevur einkarrætt at seta upp postkassar á almennt atkomiligum støðum.

Stk. 5. Landið hevur einkarrætt at nýta posthúmerkið.

Stk. 6. Landsstýrismanninum er heimilað í kunngerð at áseta nærri reglur um vekt, støddd og skap á posti smb. stk. 1 og um annan gjaldsháttt enn frímerki.

Skyldur landsins

§ 5. Landið hevur skyldu at tryggja postflutning av adresseraðum brøvum, pakkum og blindalestri frá sendarum uttanlands til móttakarar í Føroyum ella uttanlands og frá sendarum í Føroyum til móttakarar í útlondum.

Stk. 2. Somuleiðis hevur landið skyldu at tryggja postflutning um alt landið av:

a) adresseraðum brøvum,
b) adresseraðum prístistum, bóklingum, bløðum og øðrum prentaðum sendingum, eins til innihalds, sum ikki eru í bjálva.
c) tíðindabløðum, dag-, viku- og mánaðarblaðum og tíðaritum,
d) adresseraðum pakkum.
e) blindalestri.
f) peningaflytingum.

Stk. 3. Tað skal vera gjørligt at senda brøv og pakkar sum virðispost, brøv harumframt sum innskrivaðan post.

Stk. 4. Landsstýrismaðurin kann í kunngerð gera av, at postflutningur kann verða avmarkaður, tá serlig viðurskifti gera seg galdandi.

Stk. 5. Landsstýrismanninum er heimilað í kunngerð at áseta nærri reglur um post, herundir um vekt, støddd og skap smb. stk. 1 og 2 og um peningaflytingar.

§ 6. Verða adresserað brøv frá sendara í Føroyum til móttakara í Føroyum, latin inn til postflutnings í øðrum landi, kann tann postvinnurekandi syta fyri móttøku.

Stk. 2. Landsstýrismaðurin kann í kunngerð áseta nærri reglur um treytirnar fyri at syta móttøku.

Kapittul IV.
Umsiting av einkarrætti v.m.
Umsiting

§ 7. Landsstýrismaðurin tryggjar at endamál lógarinnar verður framt, herundir at skylda landsins til postflutning eftir § 5 verður lokin.

Stk. 2. Landsstýrismanninum er í hesum sambandi heimilað í kunngerð at áseta nærri reglur um postflutning, herundir reglur sum heilt ella partvíst áleggja postvinnurekandi at átaka sær postflutning, sum landið hevur skyldu til at tryggja eftir § 5. Reglurnar kunnu m.a. eisini innihalda treytir um:

a) Góðkenning av almennum viðskiftatreytum.
b) Tænastu- og dygdarstig.
c) Samstarv millum postvinnurekandi til tess at tryggja almenningsins besta postflutning.
d) Hámarksgjøld fyri postflutning.
e) Skyldu at uppihalda postflutning ið er týðandi fyri samfelagið, bíðast óvanligar umstøður.
f) Skyldu at nýta posthúmerkið við frámerki eftir umstøðunum.
g) Skyldu at hava sjálvstøðugan roknskap fyri postflutning.
h) Gjald fyri umsiting landsstýrisins av postflutningunum, herundir rakstur av eftirliti.
i) Javningargjald.
j) Trygd fyri kostnaði av postflutningunum skuldi koncessiónshavarin steðgað starvsemi sínum ella farið á húsagang.

Fræls øki

§ 8. Landsstýrismaðurin kann við kunngerð undantaka úvísar partar av postflutninginum frá einkarrættinum. Er konsessión veitt á økinum, skal viðkomandi hoyrast, áðrenn økið verður undantikið.

Konsessión

§ 9. Landsstýrismanninum er heimilað at veita loyvi til postflutning sambært § 4, stk. 1 og onnur rættindi sambært § 4, stk. 3-5. Loyvið kann veitast við ella uttan einkarrætti. Í loyvinum, sum skal vera fyri avmarkaða tíð, skal virkisliga og staðarliga økið, hon fevnir um vera tilskilað. Treytir, ið lagdar verða við tá loyvið verður givin, skulu vera sakligar, glærar og tryggja at mannamunur verður ikki gjørdur umsøkjara millum.

Stk. 2. Áðrenn landsstýrismaðurin veitir loyvið, skal hann tryggja sær, at umsøkjari er fíggjarliga og yrkisliga førur fyri at reka postflutning.

Stk. 3. Í loyvinum kunnu treytir, umframt tær í § 7 nevndu, leggjast við, m.a. um:

a) Posthús.
b) Skyldu fyri egnan kostnað at taka lut í altjóða samstarvi um postflutning.
c) Skyldu at greiða serstakar uppgávur, hóast tær einki kasta av sær ella geva hall.
d) Rindan av loyvisgjaldi.

Stk. 4. Landsstýrismaðurin kann broyta loyvistreytirnar, um fortreytirnar fyri veiting av loyvi vóru skeivar ella seinni eru broyttar ella um broytt lóggáva ella altjóða sáttmálar, sum Føroyar eru bundnar av gera broytingar neyðugar.

Afturtøka

§ 10. Landsstýrismaðurin kann taka loyvið aftur um loyvishavarin brytur hesa lógina, kunngerðir ella aðrar reglur givnar við heimild í lógini ella loyvistreytirnar.

Stk. 2. Tílík afturtøka kann tó bert setast í verk, um loyvishavarin hevur ikki rættað fyri sær innan ta freist ásett er í boðum frá landsstýrismanninum um mishald.

Stk. 3. Landsstýrismaðurin kann áleggja loyvishavaranum dagligar ella vikuligar bøtur, til hesin hevur rættað fyri sær.

Flyting av rættindum

§ 11. Rættindi sambært loyvinum kunnu ikki verða flutt øðrum, uttan so at landsstýrismaðurin frammanundan hevur givið skrivligt loyvi til tess.

Stk. 2. Úttøka ella útpanting kann ikki fremjast í rættinum sambæri loyvi og rætturin gongur ikki inn í konkursbúgv loyvishavarans.

Javningargjald

§ 12. Landsstýrismaðurin kann áleggja postvinnurekandi eitt gjald til fígging av postflutningi um landið alt.

Stk. 2. Landsstýrismanninum er heimilað í kunngerð at áseta nærri reglur fyri umsitingini av javningargjaldinum.

Kapittul V.
Um postflutning

§ 13. Sendari kann krevja post afturflyggjaðan ella broyta aðressuna, til posturin er útflyggjaður ella fráboðaður móttakaranum.

§ 14. Postur verður útflyggjaður móttakaranum ella honum ið hevur fulltrú at taka ímóti.

Ikki avgreiddur postur

§ 15. Postur, sum ikki kann avgreiðast, kann verða seldur. Søluágóðin skal, eftir at útreiðslurnar eru drignar frá, gjaldast honum, ið innan eitt ár eftir søluna sannar rætt sín. Annars fellur ágóðin landinum til.

Stk. 2. Landsstýrismaðurin ásetir í kunngerð reglur um sølu, nær metast má at postur ikki kann verða avgreiddur og hvat gerast skal við tílíkan post, herundir eisini reglur um upplating til tess at finna fram til móttakara ella sendara, ella um postur er skaddur.

Stk. 3. Virðisleysur postur verður burturbeindur.

§ 16. Postur má ikki innihalda spreingievni, eldfim ella onnur vandamikil evni. Heldur ikki má narkotika flytast í posti. Sama er við tilfari sum er hannað at flyta, breiða út, ella sum sæst at vera ólógligt, ósømiligt ella ærukenmandi.

Stk. 2. Vandamikil postur kann verða burturbeindur.

§ 17. Annar postur enn innskrivaður ella virðispostur má ikki innihalda pening, handhavaravirðisskjøl, dýran málm, skartgripir ella tílíkar virðislutir.

§ 18. Hvør tann, ið rekur reglufliga flutningstænastu innanlands ella til útlond, hevur eftir áheitan skyldu til at flyta post, umroddur í § 5, millum endastøðir og poststøðir á flutningsleiðini. Tílíkur postur skal hava forrætt framum annan vøruflutning.

§ 19. Húseigari hevur skyldu til at hava postriva á

húsinum ella seta upp brevkassa á ella við hús sini.
Stk. 2. Landsstýrismaðurin kann í kunngerð áseta reglur hesum viðvíkjandi og um uppseting av felags brevkassaskipan, har bústaðarviðurskiftini eru soleiðis at postútflygging annars hevði verið órímiliga arbeiðskrevjandi ella tvørlig.

Kapittul VI.
Tagnarskylda og endurgjald
Tagnarskylda

§ 20. Tann sum fæst við postflutning má ikki geva óviðkomandi upplýsingar um post hjá øðrum ella geva teimum høvi til at útvega sær slíkar upplýsingar.
Stk. 2. Tagnarskyldan stendur við eftir at viðkomandi ikki longur fæst við postflutning.
Stk. 3. Tagnarskyldan er eisini galdandi fyri tey sum eru starvsett hjá honum, ið fæst við postflutning.

Endurgjald

§ 21. Landsstýrismaðurin ásetir í kunngerð nærri reglur um endurgjaldsskylduna fyri skaddan, horvnan ella seinkaðan post, sum landið eftir § 5 hevur skyldu til at tryggjað flutningin av.

Kapittul VII.
Skráseting og eftirlit

§ 22. Postvinnurekandi hava skyldu til at lata seg skráseta hjá landsstýrismanninum.
Stk. 2. Landsstýrismaðurin hevur eftirlit við, at lógin, kunngerðir ella aðrar reglur givnar við heimild í lógini og loyvistreytir verða hildnar.
Stk. 3. Landsstýrismaðurin kann krevja, at postvinnurekandi geva tær upplýsingar, sum neyðugar eru til tess at útinna eftirlitið, herundir eisini roknskapartilfar.
Stk. 4. Eftirlitsvitjan gevur, móti fyrivísing av samleikaprógvi, uttan rættarúrskurð ótarnaða atgongd til øll støð har postflutningur verður rikin.
Stk. 5. Landsstýrismaðurin kann lata øðrum upp í hendur at útinna skráseting og eftirlit.
Stk. 6. Landsstýrismanninum er heimilað at seta nærri reglur fyri skráseting og eftirliti, herundir reglur um góðkenning av ávísum eftirlitsfólki, smb. stk. 4.

Revsing

§ 23. Er ikki harðari revsing ásett í aðrari lóg, verður hann revsaður við bót, sum brýtur:
1. Landsins einkarætt til:
   a) postflutning, smb. § 4, stk. 1,
   b) útgávu av frímerkjum, smb. § 4, stk. 3,
   c) uppsetan av postkassum, smb. § 4, stk. 4,
   d) nýtslu av postbúmerki, smb. § 4, stk. 5.
2. Reglurnar í § 7, stk. 2.
3. Loyvistreytirnar, smb. § 9.

Stk. 2. Er brotið eftir stk. 1 framt av felagi, sjálvsognarstovni, grunni ella líknandi, kommunu ella kommunalum felagsskapi, kunnu hesi revsast samsvarandi.

§ 24. Fyri tann sum fæst við postflutning, er §§ 152, 152d-f og 153 í revsilógini samsvarandi galdandi.

Kapittul VIII.
Gildiskomureglur

§ 25. Henda lóg kemur í gildi 1. januar 1998, og samstundis fer úr gildi løgtingslóg nr. 17 frá 31.03.1976 um Postverk Føroya við seinni broytingum, tó soleidis, at tær kunngerðir, givnar við heimild í nevndu lóg, verða galdandi til annað verður ásett í kunngerð.

Almennar viðmerkingar

Kapittul 1
Inngangur

Á fundi 02.06.1997 í Vinnumálastýrinum, avgjørdi landsstýrismaðurin í samskiftismálum soljóðandi kommissorium viðvíkjandi nýggjari lóg um postflutning:

Føroya Landsstýri metir tað sum skyldu at tryggja bóskandi postflutning millum tey ymsu plássini í Føroyum. Í hesum liggur viðurkenningin av, at tað hevur stóran týdning fyri borgaranar sum heild og fyri vinnulívið, at teimum verður tryggjað so góðan postflutning, sum tað nú ber til, og at vit ikki láta ósamiliga stórar munir á hesum øki. Atgongd til postflutning hevur týdning fyri trivnað og mentan, og fyri kappingarførið hjá vinnulívinum, og fyri at partur av landinum ikki vera fyri óhóskandi trivnaðarligum og vinnuligum vanbýti.

Á samskiftisøkinum sum heild og herí eisini á postflutningsøkinum fer frum ein ovurhonds stór menning

umframt liberalisering, og fyri at tryggja at Føroyar ikki verða eftirbátur á hesum sera týdningarmikla øki, heldur landsstýrið tað vera rætt at seta arbeiðsbólk at gera uppskot til nýggja lóggávu innan hetta virksemi. Arbeiðsbólkurin skal grunda lógaruppskot sítt á hesar meginfyritreytir:

1. Landsstýrið fær einkarrætt til postflutning.
2. Landsstýrið kann veita loyvi til postflutning og -virksemi.
3. Postverk Føroya verður gjørt til eitt partafelag.

Bólkurin verður settur við umboðum frá Samskiftisdeildini í Vinnumálastýrinum og Postverk Føroya.

Arbeiðið skal vera liðugt, soleiðis at nýggjar lógir skulu kunna samtykkjast í ár.

Nevndin hevur í samráð við landsstýrismannin avgjørt fyrst at gera uppskot til nýggja lóg um postvirksemi, meðan arbeiðið við nýggjari lóg um bygnaðin á Postverk Føroya heldur áfram.

Nevndin hevur útvegað tilfar úr Noregi, Svøríki, Finnlandi, Álandi, Íslandi, Danmark og Týsklandi, umframt úr ES og alfjóða konventiónum.

Kapittul 2
Stutt søgulig lýsing av postflutningi
Nøkur tøl

Posttflutningur er partur av gerandisdegnum hjá fjøld av fólki um allan heim. Felagsskapurin The Universal Postal Union(UPU), hvørs høvuðssæti er í Sveits, er serligur felagsskapur undir SÞ, sum tekur sær av at samskipa ta heimsumfatandi posttænastuna. Í hesum felagsskapi vóru 189 limalond í 1996.

Fyri at fáa eina fatan av, hvussu umfatandi henda tænasta er, kunnu nøkur megintøl nevnast, sum eru tikin frá UPU.

Mett verður, at í 1996 arbeiddu umleið 6,2 mill. fólk innan postverkini á stívliga 700.000 posthúsum. Tey avgreiða árliga uml. 430 milliardir brøv og aðrar postsendingar og pakkar innlendis og umleið 10 milliardir brøv v.m. sum fara um landamørk.

Samanumtikið roknaði UPU í 1995 við, at vanligur brævpostur var uml. 20% av øllum samskiftinum í heiminum; telefon og telefax stóðu fyri uml. 75% og elektróniskur postur (teldupostur) hevði hert 5%. Metingar teirra vóru, at ikki fór at verða stór broyting í hesum hýtinum komandi árini, tó at telduposturin fór at mennast mongrundi og at vanligur postur fór at minka niðurum 15%.

Eitt sindur um altjóða postsøgu

Uppruni til postflutning er huldur í tíðarinnar mjørkatámi. Frá fornari tíð finnast slóðir eftir skipaðum samskifti í londum sum Kina, Persia, Egyptalandi, Grikkalandi og Rómverjarikinum.

Tað menn vita um, er, at fyrsta skjalið, ið sent varð sum postur, varð funnið í Egyptalandi, og er frá ár 255 fyri Krist. Tá vóru tað serliga boðdreingir sum kongar og aðrir høgir harrar nyttu. Seinni vóru tað serliga átrúnaðarligir felagsskapir og fróðskaparsetur, sum menn tænastuna at senda boð millum sín. Millumstøðir vóru stovnaðar á rutunum fyri at framskunda boðtænastuna mest møguliga, serliga á teim longru teinunum. Seinni fingu privatfólk, serliga handilsmenn, í hendinga førum loyvi at nyta hesa boðtænastu.

Tá prentingin var uppfunnin, øktist postflutningurin almikið. Í hesi fyrstu posttænastu var gjaldið fyri flutningin vanliga ikki goldið av sendaranum, men av móttakaranum. Frímerki var ókent fyribrigdi.

Tað var ikki fyrr enn í 17. øld, at tann fyrsti altjóða postsáttmálin sá dagsins ljós. Tá var sáttmáli gjørdur millum nøkur lond í Europa, sum skipaði ein part av postflutningi um landamørk.

Í 19. øld vóru viðurskiftini so fløkt, at torført var at finna runt í teim mongu avtalunum landanna millum, sum øll nyttu ymisk postgjøld, ymiska flokkan av posti, ymist gjaldoyra v.m.

Tørvurin á skipaðum viðurskiftum øktist, og sum frá leið sóu flestu lond tað neyðuga í at gera millumlanda avtalur.

Tað vóru serliga umleggingar (reformar) í einstøkum londum, sum settu gongd á altjóða samskifti um posttænastur.

Breiland var undangongufand at skipa posttrenastuna. Teir samtykti í 1840 at flutningur av brøvum skuldi gjaldast frammanundan, og at eitt gjald uppá ein pence skuldi gjaldast fyri innanlands flutning av øllum brøvum sum høvdu ávísa vekt, sama hvussu langt var millum sendara og móttakara. Heimsins fyrsta frímerki, kent undir navninum "Penny Black" sá dagsins ljós. Frímerki var nú prógv fyri at goldið var fyri flutningin av brevinum. Danmark fekk sítt fyrsta frímerki í 1851.

Í 1863 var bildin ráðstevna í Frankaríki við tí endamáli at gera reglur um eina altjóða skipan av posttænastuni. Á ráðstevnuni luttóku 15 europeisk lond og U.S.A. Tá vóru gjørdar samtykkir um nakrar meginreglur, sum skuldu fylgjast tá sínámillum avtalur millum lond vóru gjørdar. Hesar meginreglur fingu tó bert avmarkaðan týdning og skuldi skil fáast á, var tørvur á nógv fleiri reguleringum landanna millum og meira formaliseraðum samarbeiði.

Tað vóru serliga tyskarar, sum skundaðu undir at fáa meira nágreinitliga altjóða regulering í lag. Tyskland hevði tá gjøgnumført eina innlendis umlegging av sínari posttænastu. Teir settu upp actlan fyri einum altjóða samtaki um postvirkseni, sum seinni var til veruleika sum The Universal Postal Union. Sveits helt í framhaldi av uppskoti frá Tysklandi, eina ráðstevnu í 1874, har 22 lond tóku lut. Samtyktur varð altjóða sáttmáli, sum varð undirskrivaður 9. oktober 1874.

Við millumlandasáttmálanum frá 1874 hevði eydnast at fáa skil á. Nú var talan um eitt einstakt postøki ístaðin fyri eina rúgvu av økjum. Postgjøldini, sum frammanundan vóru um 1200, vóru nú nógv avmarkað á tann hátt, at somu gjøld vórðu galdandi í øllum sáttmálalondunum fyri somu sendingar. Innan postøkið høvdu øll 22 limalondini bundið seg til meginreglurna um frælsi í flutningínum av brøvum millum lond. Flestu forðingar sum londini høvdu mótvegis postinum hjá grannalondunum, vóru nú burturbeindar.

Eitt sindur um postsøguna í Føroyum

Tinghøkumar geva okkum fleiri dømi um brøv send til og úr Føroyum. Tíl skjals er brøv frá Jákupi Skotakongi, dagf. 1. apríl 1591, sum verður sent til føroyingar, og har vita vit eisini hvør hevur verið "postbod", nevniliga Madz Balderzssonn. fúti. Annað dømi er brøv frá 1615 frá løgmanni í Føroyum til danska kongin, har klagað verður um teir nógvu sjórænararnar, sum herjaðu um oyggjarnar.

Christian IV kongur gav í 1624 út kunngerð um postbod, og hetta verður í Danmark mett sum byrjanin av tí almenna postverkinum.

Í Føroyum hevur verið lítið, fyri ikki at siga einki, av postflutningi um hetta mundi. Stórur partur av fólkinum dugdi hvørki at lesa ella skriva.

Um 1801 sigggjast tó dømi um regluligan postflutning til og úr Føroyum, tá tað var fyriskipað, at 2 túrar skuldu gerast árliga til og úr Føroyum við posti. Í 1855 gav danska løgmálaráðið Færø Amt loyvi at leiga skip ("Fortuna"), sum skuldi nytast "..så ofte vind og vejrlig tillader det, fare med postpaket mellem Thorshavn og Shetland....".

Í tíðini 1857 - 1869 verður roknað við, at umt. 9000 brevasendingar eru komnar til Føroya.

Lógin um skjúts kom í 1865 og flutningsskyldan fevndi umframt fólkaflutning eisini um post.

Í 1870 stovnaði danska postverkið eitt posthús í Tórshavn. Fyrsta veruliga danska postlógin kom í 1871 og hon var eisini galdandi fyri Føroyar. Stutt eftir varð regluligur postflutningur skipaður um stóran part av landinum við trimum høvuðsrutum og trý postboð vórðu sett at bera postin yvir land og nýta skjúts, tá tað var neyðugt.

Nýggj skipan varð sett í verk í 1903, sum hevði posthús í Tórshavn, Klaksvík og Trongisvági og savningarstøð í Miðvági, Vestmanna, á Sandi, Eiði og Strendum.

Føroyar fingu egið postverk í 1976, sí nærri niðanfyri.

Eitt sindur um Universal Postal Union

Regluverkið:
Hesin felagsskapurin er skipaður við einum slags av "grundlóg", sum er samtykt av limalondunum. Broytingar í lógini kunnu bert verða framdar á aðalfundinum, Universal Postal Congress. Felagsskapurin hevur samtykt millumlandasáttmála, nevndur Universal Postal Convention. Við heimild í hesum sáttmála hava limalondini ásett nærri reglur um ávísar tænastur, Detailed Regulations. Tað eru 4 sáttmálar gjørdir, sum hvør á sínum øki skipar postflutningin, nevniliga Postal Parcels Agreement, Money Orders Agreement, Giro Agreement og Cash-on-Delivery Agreement. Bæði lógin, sáttmálarnir og nærri ásetingarnar eru bindandi fyri limalondini.

Limaskapur:
Øll limalond hjá ST hava rætt at gerast limir. Onnur frels lond kunnu gerast limir, hóast tey ikki eru limir í ST, treytað av at 2/3 av limalondunum atkvøða fyri tí. Danmark hevur verið limur síðani stovnanina og Føroyar eru tí sum partur av ríkinum bundnar av alhjóða reglunum.

Fíggjarligt grundarlag:
Virksemið hjá UPU verður fíggjað av limalondunum. Raksturin fyri 1996 var ætlaður at kosta SFR 35 mill. (svarandi til umt kr. 162 mill. í okkara peningi).

Kapittul 3
Skipan av postflutningi aðrastaðni
A. Norðurlond

Øll Norðurlond hava seinastu árini samtykt nýggjar postlógir. Noreg fekk nýggja postlóg í ár, Svøríki og Finnland endurnýggjaðu sínar postlógir í 1993, meðan Áland fekk nýggja postlóg í 1992. Ísland hevur eina postlóg frá desember 1996 og Danmark fekk eina í 1995.

Noreg
Norska lógin er avmarkað at galda fyri postflutning av breva- og øðrum sendingum, ið viga upp til 25 kg. Norðmenn hava vurðveitt einkarrættin, tó við møguleika hjá stjórnini í kunngerð at avmarka hann. Einkarrætturin fevnir um regluligan flutning - fyri gjald - av afturlatnum adresseraðum innanríkis brøvum, ið viga upp til 350 gramm, umframt flutning av tilsvarandi posti til og frá Noregi.

Norska samskiftismálaráðið hevur heimild at veita konsessión til privatar postvinnurekandi, og kann í sambond við veiting av loyvum krevja, at ávísar skyldubundnar uppgávur verða loystar av honum.

Sambært lógini hava postvinnurekandi skyldu til at fata seg skráseta hjá tí almenna, og heimild er til at seta í verk reglur um javningargjald til fígging av postflutningi til útjaðaranøkini.

Almenna norska postteenastan er skipað sum partafelag.

Svørfki
Í svensku postlógini eru somuleiðis reglur um skyldur ríkisins at tryggja øllum landinum almenna postfaenastu. Har er liberaliseringin komin tað longri, at allar reglur um einkarrætt vóru avtiknar tann 1. januar 1993, og 1. mars 1994 varð almenna svenska postverkið umskipað til partafelag, sum tað almenna eigur - Posten A/B.

Svenska postlógin setir krøv til posvinnurekandi, sum í stuttum kunnu lýsast soleiðis:

- ◊ Landsumfatandi postflutningur av brøvum og pakkum.
- ◊ Øll skulu hava møguleika at fáa flutt brøv til eindar- og rímiligar prísir.
- ◊ Privatpersónar skulu hava møguleika fyri at fáa flutt pakkar til eindarprísir.

Postlógin ásetir ikki, hvør ið skal taka sær av postflutninginum. Tað kann vera Posten A/B ella onnur fyri tøka. Hinvegin ásetir postlógin serlig krøv til postvinnurekandi.

Postvirksemi verður í lógini lýst sum: "regelbunden befordran mod avgift av brev och paket med en högsta vigt av 20 kg".

Fyri at tryggja skyldnubundnu uppgávurnar, hevur staturin gjørt avtalu við Posten A/B, sum hevur bundið seg til:

- ◊ At taka á seg landsumfatandi post- og figgjartænastur í samsvari við endamál lógarinnar. Vanliga skulu øll hava post 5 dagar um vikuna.
- ◊ Við áseting av kostnaði av brøvum upp til 500 gram, skal serligt atlit havast til nettoprístalið.
- ◊ At átaka sær flutning av blindafestri og ávísum tænastum til rørslubrekað.
- ◊ At átaka sær tilbúgvingaruppgávur.

Viðvíkjandi figgjartænastum, skal tað verða møguligt hjá øllum at gjalda inn ella taka út kontantan pening.

Finnland
Heldur ikki finska lógin hevur reglur um einkarrætt. Heimild er til at veita loyvi til postflutning til finskar fyritøkur, almennar stovnar og útlendskar fyritøkur sum hava skrásett dótturfelóg í landinum. Fyri at fáa loyvi krevst, at umsøkjarin figgjarliga og yrkisliga er førur fyri at útinna tílíkt virksemi. Loyvið kann av marka virksemið til ávísar tænastur og ávís pláss ella landspartar. Finska postverkið varð skipað sum partafelag, Posten Finland AB, frá 1. januar 1994 at rokna. Sum er, er tað bert Posten Finland AB, ið rekur postflutning í Finnlandi sambært loyvi.

Sambært finsku postlógini hava postvinnurekandi skyldu at reka postvirksemi samsvarandi treytum, ið skulu vera almennar og postgjøldini skulu vera rættvís og í rímiligum samsvari við meðalkostnaðin av virkseminum. At hava eftirlit við at postlógin og reglur givnar sambært lógini verða hildnar, varð í 1994 stovnað nýggj umsitingarstova, Postforvaltningen, sum er skipað sum undirdeild av Teleforvaltningscentralen. Umsitingarkostnaðurin verður figgjaður við gjøldum frá teimum, ið hava loyvi til postflutning. Finska ríkið rindar ongan stuðul til postflutning, sum kemur undir postlógina.

Ísland
Íslendska lógin um postflutning byggir í stóran mun á tær nyskipanir, sum longu vóru settar í verk í hinum Norðurlondunum og ES. Eitt meginhugtak í íslendsku lógini er grundposttænasta, sum er at skilja sum innsavning, flokking og flutningur av brøvum og øðrum sendingum við uttanáskrift sum viga undir 20 kg. Sambært lógini hevur ríkið skyldu at tryggja øllum landsmonnum regluligan postflutning innan grundtænastuna. Ríkið hevur einkarrætt til flutning av brøvum, ið viga upp til 350 gr., tó fellur einkarrætturin burtur fyri sendingar, hvørs postgjald er 5 ferðir hægri enn lægsta postgjaldið eftir gjaldsskránni. Harumframt hevur ríkið einkarrætt til postflutning, ið stórt sæð svarar til einkarrættin, sum er skotin upp í landsstýrisins lógaruppskoti.

Heimild er at veita privatum loyvi til postflutning.

Frá 1. januar 1997 at rokna hevur partafelagið Póstur og sími hf tikið við rættindum og skyldum hjá almenna post- og telestovninum. Ætlanin er at skilja partafelagið sundur 01. januar 1998, soleiðis at postvirksemi og fjarskifti eru hvør sær.

Danmark
Galdandi danska lógin um postvirksemi ásetir at staturin hevur einkarrætt til flutning av adresseraðum brøvum innanlands umframt brøvum til og úr Danmark.

Heimild er hjá ferðslumálaráðharranum at avmarka einkarrættin.

Nærri reglur um vekt og skap av brøvum og øðrum posti, verða ásettar í kunngerð. Staturin hevur hinvegin skyldu at tryggja landsumfatandi flutning av ávísum posti, herundir adresseraðum brøvum, blaðum, pakkum og blindasendingum.

Sambært lógini er heimild at veita privatum loyvi til postflutning.

Sum nevnt aðrastaðni fremja danir nyskipanina av almenna postverkinum stig fyri stig, og byrjaðu í 1995 við at skipa Post Danmark sum sjálvstøðugan almennan stovn. Røddir eru fyrimi um at skipa Post Danmark sum partafelag.

B. Rákið í ES

Sjálvt um altjóða reglur eru um postflutning, hevur ES arbeitt við at bøta um postflutningin í limalondunum og serliga havt fyri eyga at skapa frælsa kapping á økinum. ES-kommissiónin gav 11. juni 1992 út umfatandi verk, nevnt Grønabók, har evni er menningin av postflutninginum í innara marknaðinum. Meginreglurnar í hesum verki eru:

- at tryggja verður landsumfatandi tænasta við líkari atgongd fyri øll,
- at tænastan verður dygdargóð og fyri rímiligan prís,
- at einkarrætturin verður skerdur mest møguliga og annars, at hann svarar til tørvin á postflutninginum fyri alt landið,
- at landið, tá tað ræður um at gera av hvat einkarrætturin skal fevna um, nytur reglur um vekt og prís,
- at nakrar tænastuveitingar, sum til dømis snarpostur og blaðpostur, ikki skulu vera undir einkarætti,
- at skilt verður gjøllla millum tann sum hevur eftirlit og tann sum virkar á økinum,
- at sett verða krøv til dygdina og at tað ber til at máta dygdina, sum eisini skal almannakunngerast.

Til tess at røkka endamálinum skulu limalondini miðvíst arbeiða fyri frælsari kapping um postflutning. Einkarrætturin, sum nógv lond enn hava varðveitt, verður framhaldandi skerdur. Krøv verða sett um, at tænastan og dygdin verður so eins sum til ber. Treytir, sum postverk arbeiða eftir, skulu ikki gera mannamun, verða sakligar og gjørdar. Postverkini skulu roknskaparliga skilja postflutningin frá øðrum virksemi teirra o.s.fr. Fræls kapping innan postflutning hevur ikki verið vanlig. Seinnu árini hava tó fleiri lond í ES tikið stig til at liberalisera postflutningin. Henda liberaliseringin hevur havt ymisk snið. Í fleiri londum hava teir skift postflutningin frá tí almenna og lagt hann til partafelóg, sum tað almenna, beint ella partvist, hevur verið eigari av. Sum dømi kunnu nevnast Svørtki, Finnland, Týskland og Háland. Í Danmark hevur gongdin verið at skerja einkarrættin, meðan lond sum Svørtki og Finnland heilt hava avtikið hann.

Privatir postvinnurekandi hava í størri mun tikið upp kapping við tey almennu postverkini á teimum økjum har hesi framvegis hava hövdu einkarrættindi. Samstundis hevur eitt eydkenni verið, at tey almennu postverkini hava fingið størri handilsligt virkisfrælsi, soleiðis at almennu postverkini kunnu kappast við teir privatu eisini á nýggjum tænastuveitingum.

ES er nú væl áleiðis komið í arbeiðinum at samtykkja nytt Direktiv, sum í stóran mun endurtekur meginreglurnar frá sonevndu Grønubók.

Kapittul 4
Galdandi lógir og kunngerðir v.m.

Beint eftir heimastýrislógina var mál um postverk á skránni undir viðgerð av løgtingsmáli nr. 2/1948: Fíggjarløgtingslóg...

Tá samtykti løgtingið 7. sept. 1948 at yvirtaka postverkið. Henda løgtingssamtykt varð kortini ikki sett í verk tá. Í 1972 var í løgtingsmáli nr. 70/1972: Yvirtøka av skipaeftirlitinum, tann 11. apríl 1973 samtykt sum ljóðandi uppskot: "Landsstýrinum verður álagt sbrt. tingsamtykt frá sept. 1948 at upptaka samráðingar við donsku ríkismyndugleikarnar um yvirtøku av postverkinum".

Síðani vóru samráðingar tiknar upp og fyrireikingar gjørdar til yvirtøku av postverkinum, sum boyrdi undir Ministeriet for offentlige arbejder, generaldirektoratet for post- og telegrafvæsenet.

Úrslitið av samráðingunum varð ein avtala um at yvirtøkan skuldi fara fram 1. apríl 1976. Landið yvirtók økeypis bygningar og aðra útgerð, sum danska post- og telegrafverkið átti. Løgtingslógin um Postverk Føroya er nr. 17 frá 31. mars 1976. Lógin er seinni broytt við løgtingslóg nr. 113 frá 22. desember 1989.

Víst verður til Løgtingstíðindi A frá 1975, síðu 322 til 340.

Umframt sjálva postlógina varð í 1976 samtykt L.l. nr. 45 frá 9/5-1976 um viðurskifti hjá starvsfólki á postverkinum í samband við yvirtøku. Lógin ásetir at landsstýrið saman við fíggjarnevndini fekk heimild til at veita starvsfólki, sum undan yvirtøkuni vóru tænastumenn, og sum aftaná yvirtøkuna ynskti at halda fram sum starvsmenn við eftirløn, eftirlønarrætt. Somuleiðis fekk landsstýrið heimild til at endurinda statinum løn og eftirløn til 6 tænastumenn, sum vóru lantir til Postverk Føroya.

Við heimild í postlógini er lýst kunngerð nr. 145 frá 20/10 1992 um postgjøld við seinni broytingum.

Galdandi postlóg hevur bæði reglur um postvirksemi og skipanina av Postverki Føroya. Í nýggjari løggávu er vanligt at skipa hesi viðurskifti hvør sær.

Eftir galdandi lóg er tað Postverk Føroya, sum hevur einkarrætt, og er hann lýstur soleiðis: ".. at savna, flyta og bera út afturlatnar sendingar og kort, ið kunnu sendast sum postur, og sum innihalda skrivlig boð, herundir prentað boð útfylt við skrift, tó ikki opin fylgibrøv viðvíkjandi sendingum t.d. vørurokningar og farmaskjøl".

Skyldur postverksins eru lýstar í §§ 11-13 og umfata brævasendingar og pakkar har móttakari er tilskilaður, og postávísingar, blað og tíðarrit umframt giro. Harumframt kann postverkið átaka sær aðrar avgreiðslur, smb. §12, stk. 2. Vert er at bíta merki í, at einkarrætturin ikki fevnir um pakkar.

Í § 17 er ásett, at postgjøld av týdningi verða ásett av landsstýrinum í samráð við fíggjarnevndina.

Endurgjaldsskylda postverksins er gjølliga lýst í lógini (§§ 27-42)

Nøkur tøl um postflutning í Føroyum:
Postverkið er skipað við stjórn og seks deildum. Hesar eru: Marknaðardeild, Ráðleggingardeild, EDV-deild, Girostova, Umsitingardeild og Frímerkjadeild. Tað eru 42 posthús og 324 starvssett, sum, umroknað til fulltíðarstørv, svara til 260 fólk. Postverkið avgreiddi í 1996:

◊	brævasendingar	7.200.000
◊	pakkar	222.000
◊	innkjaldingar og flytingar	1.200.000
◊	føroysk blað	2.400.000
◊	adressuleysar sendingar	2.900.000

Girostovan hevði í 1996 umt. 4000 konti við einum innistandandi við árslok uppá kr. 64 mill.

Frímerkjadeildin gav út 19 frímerki í 6 umførum.

Samlaða rakstrarúrslitið hjá Postverki Føroya var eitt halt uppá kr. 150 túsund, móti einum halli uppá kr. 4 mill. árið fyri.

Frímerkjadeildin hevði eitt avlup uppá stívliga kr. 7 mill.

Fíggjarstøðan javnvigaði við kr. 43 mill.

Kapittul 5
Samandráttur

Um lað lógaruppskot til nyskipan av postflutningi í Føroyum, ið við hesum verður lagt fyri løgtingið til støðutakan, kann í stuttum sigast, at samstundis sum grundleggjandi reglumar í galdandi skipan um skyldur hins almenna til at tryggja ávísan postflutning og ein ávísur einkarrættur verða varðveitt, verður samstundis latið upp fyri fríari kapping, tó undir skipaðum viðurskiftum.

Skotið verður upp, at einkarrætturin verður umsitin soleiðis, at ein ella fleiri kunnu fáa loyvi til postflutning, har rættindi og skyldur eru ásett. Samstundis er heimilað landsstýrinum, so hvørt sum umstøðurnar tala fyri tí, at skerja einkarrættin. Fyri at tryggja útjaðaraokjunum góðan postflutning, er t.d. heimilað at áleggja loyvishavara sum virkar á meginøkjunum, eisini at reka postflutning á útjaðaraokjunum. Somuleiðis er heimilað at áleggja teimum postvinnurekandi eitt javningargjald, til tess at útjaðaraokini verða tryggjað.

Í lógaruppskotinum hava teir sum vilja reka postflutning, skyldu til at lata seg skráseta. Hetta er fyri at tað neyðugar eftirlitið kann vera við virkseminum til tess at tryggja skipað viðurskifti.

Kapittul 6
Fíggjarligar avleiðingar

Í fyrsta lagi er at nevna, at tað almenna verður loyst frá beinleiðis ábyrgd av postflutningunum, sum ætlanin er í einum komandi lógaruppskoti um skipan av Postverki Føroya at leggja í eitt partafelag. Harafturat kemur, at tað almenna skuldi fingið ávísar inntøkur frá loyvisgjøldum og skatti.

Eftirlitið kann hóskandi skipast soleiðis, at tað verður lagt saman við verandi almennum stovni og heimild er í uppskotinum at áleggja loyvishavarunum at rinda útreiðslurnar av eftirlitinum.

Samanumtikið metir landsstýrið sostatt at hendan lógin er útreiðslumeutral.

Viðmerkingar til tær einstøku greinirnar

Til § 1.

Reglan setir upp nøkur stevnumið, sum hildið verður at, eru nýggj lóg um postvirksemi eigur at hava sum kann. Raðfestingin er ikki ætlað sum uttað eitt nakrar meginreglur fyri at lýsa endamálið við lógini.

Í litra a er meginregla um, at postur skal røkka um alt landið.

Í *litra b* er víst á, at postflutningur skal vera fyri ein rímiligan prís og við góðari dygd. Tá talan er um dygd, verður serliga hugsað um títtleikan av postflutninginum, og at hesin er so regluligur sum umstøðurnar loyva.

Í *litra c* verður dentur lagdur á postloyndina, eisini nevnd tagnaðarskyldan. Postloyndin er tryggjað í grundlógini. Júst tá talan er um postflutning, er tað umráðandi, at tað ikki verður gingið viðskiftafólki ov nær. Her verður serliga hugsnð um, at postflutningur skal vera so tryggur, at vissa er fyri, at samskiftið er loynt fyri øðrum. Tagnarskyldan, ið liggur á teimum ið fáast við postflutning, eigur at vera sera strong.

Í *litra d* er tillaging eftir skiftandi tørvi tilskilað. Menningin innan partar av postflutninginum er stór, og tær tænastur sum verða bjóðaðar fram, broytast skjótt. Tað er neyðugt, at lógin er so liðilig sum tilber, soleiðis at broytingar uttaneftir skjótt kunnu setast í verk her, um politiskt ynski er um tað.

Í *litra e* er tilskilað, at eitt av endamálum lógarinnar er at skapa fortreytir fyri frælsari kapping. Sum kunnugt, hevur Postverk Føroya sum er einkarrætt til partar av postflutninginum í Føroyum. Soleiðis hevur eisini verið í flestu londum, at ávís statsmonopol hava havt einkarrætt til postflutning. Seinnu árini er hetta munandi broytt í teimum londum, sum vit vanliga samanbera okkum við.

Í Norðurlondum eru tað Svøríki og Finland, sum eru komin longst í liberaliseringini. Í hesum báðum londum er einkarrætturin avtikin. Í Noregi og Íslandi er postflutningurin lagdur í partafeløg, sum tað almenna eigur. Í Danmark fekst, hóast ynski frá leiðsluni í Post Danmark, ikki politiskur meiriluti fyri reinum partafelagi og úrslitið gjørdist ein almennur stovnur, nakað líkur einum partafelag. Røddir eru tó aftur frammi í Danmark um at takað stigið fult út.

Tann liberalisering sum er farin fram í Norðurlondum, hevur eisini samband við royndirnar í ES at skapa frælsa kapping í limalondunum á postflutningsøkinum.

Til § 2

Sambært heimastýrislógini er á Lista A undir pkt. 12 nevnt "Statligt Post- og Telegraf- og Telefonvæsen". Málsøkið varð sum kunnugt yvirtikið 1. apríl 1976, og er lóggávuvaldið á økinum sostatt hjá Føroya Løgting. Sakliga virkisøki lógarinnar stendur í § 2. Staðarliga virkisøki lógarinnar er ikki nærri útgreinað, av tí at tað fylgir vanligu staðarligu heimild løgtingsins.

Til § 3

Neyðugt er at hava nakrar allýsingar í lógini, soleiðis at lógarteksturin verður lættari at lesa. Eisini eru nakrar allýsingar grundaðar á, at postflutningur í stóran mun er skipaður í altjóða høpi, og tað slepst tí ikki undan, at brúka nøkur av teimum hugtøkum, sum finnast í altjóða sáttmálum v.m. Nøkur av orðunum, hóast ikki í allýsingunum, eru í neyvum samsvari við altjóða sáttmálan um postflutning. Skeitt hevur eisini verið til tær allýsingar, sum hini Norðurlondini, serliga Ísland, Noregi og Danmark hava nýtt í teirra lógarverki. Eisini hevur nýggju direktivið frá ES, sum enn ikki er samtykt, verið havt í huga.

Hugtakið *Postur* setur her karmin fyri, hvat lógin fevnir um. Universal Postal Convention (UPC) nytur heitið "postal item" fyri sama hugtak. Heitið "postur" er her at skilja sum sjálvur futurin, sum verður fluttur. Onnur lond hava nýtt orð sum postsending o.l. Postur í lógarinnar høpi, vigar upp til 20 kg. T.v.s. at sendingar omanfyri 20 kg als ikki koma undir lógina. Sendingar upp til 20 kg kunnu vera bæði brøv og pakkar. Markið millum brøv og pakkar er ikki sett í lógina, men ikki er óvanligt aðrastaðni - t.d. Svøríki - at skilnaður verður gjørdur millum hesar sendingar, soleiðis at brøv viga hægst 2 kg, meðan postpakkar viga omanfyri 2 kg, tó hægst 20 kg.

Innskrivaður- og virðispostur er skyldubundin posttænasta sambært UPC.

Postvinnarekandi er hvør tann, ið rekur vinnuligan postflutning. Her verður dentur lagdur á, at virksemið er

av vinnuligum slagi. Tann, sum rekur slíkt virksemi, annaðhvørt tað er støðugt, av og á ella hendingaferðir er at skilja sum postvinnurekandi, treytað av at goldið verður fyri tænastuna. Undir hetta heiti koma feløg sum Postverk Føroya, Post Danmark v.m. Av hesum skilst, at flutningur av "posti" í ella fyri egið virki ikki kemur undir lógina.

Hvat hugtakinum *Postflutningur* viðvíkur, eru við orðunum innsavning, skiljing, flutning og útlygging allar síður av tænastuni tiknar við. Um ber eitt av nevndu liðum er til staðar, er talan um postflutning.

Javningargjald er gjald, sum hongur saman við, at lógin gevur møguleikar fyrí frælsari kapping um postflutning. Við frælsari kapping kundi vandi annars verið fyri, at útjaðaraøki vóru fyri vanbýtt, av tí at møgulig kapping helst verður á meginøkjunum. Ætlanin við javningargjaldinum er at kunna bava pening tøkan til tess at dyggur postflutningur eisini verður á smærri plássunum. Slík skipan er væl kend aðrastaðni, t.d. í Noregi og Íslandi, har landið skipar soleiðis fyri, at tey sum vinna pening av postflutningi í meginøkunum, skulu rinda gjald, ið verður nýtt til at fíggja postflutning til útjaðaraøkini. Eisini nýggja ES-direktivið nýtir hesa skipan sum ein møguleika at tryggja útjaðaraøkini.

Til kapittul III

Her verða eitkan ættur og skyldur landsins staðfest. Rættindahavarin er eftir lógaruppskotinum landið. Orðið er valt ístaðin fyri annaðhvørt Føroya Løgting, Føroya Landsstýri ella Heimastýrið. Í grannalondum okkara eru rættindi og skyldur vanliga tengdar at "statinum".

Til § 4

Greinin ásetir tann einkarrætt, sum landið hevur til postflutning, frímerki, postkassar og búmerkið. Einkarrætturin til postflutning fevnir bæði um innlendis flutning og flutning av posti sendur úr Føroyum og til Føroya. Tann postur talan er um, er sum lýst í allýsingini, "adresseraðar sendingar í afturlatnum brævbjálva ella líkari innbalting, sama hvat innihaldið er, og adresserað skrivlig boð við persónligum innihaldi, postkort íroknað", og sum viga upp til 20 kg.

At tað júst er ein skilnaður millum afturlatnar sendingar og opnar sendingar, hevur sín søguliga uppruna, og verður hesin skilnaður nýttur í flestu øðrum londum.

Í stk. 2 er ávísur postflutningur undantikin einkarrættinum, eitt nú prístistar, blað og prentlutir. Hetta er postur sum vanliga hevði verið sendur opin, og sostatt lættliga kundi verið skaddur, eitt nú av regni. Tí er heimild til at slíkur postur kann verða sendur í afturlatnum bjálva, tó treytað av at bjálvin er gjøgnumskygdur, og sostatt ikki verður nýttur til persónligan post.

Tað er í stk. 6 heimilað landsstýrismanninum at seta nærri reglur um vekt, stødd og skap fyri post. Tørvur er á tílíkari heimild fyri lættari at kunna umskipa viðmiðunum í Føroyum at svara til broyttar umstøður í grannalondum og møgudigar broytingar í altjóða sáttmálum.

Til § 5

Landið hevur sum omanfyri nevnt, einkarrætt til ein part av postflutningi í Føroyum. Hesin einkarrættur verður mótsvaraður av eini skyldu til at tryggja postflutning. Skyldan er nógv víðari enn tann postflutningur, sum einkarrætturin fevnir um.

Samhæft UPC hava limalondini skyldu til at tryggja landsumfatandi postflutning av adresseraðum brøvum og pakkum, umframt blindalestri. Hesir lutir - og aðrir - eru tiknir við í stk. 2. Eisini ásetur UPC at limalondini skulu tryggja, at tað ber til at senda innskrivaðan post og virðispost.

Meginreglan er, at hvør borgari í landinum hevur sama rætt til postflutning. Tað er ein samanroynd, at ferðasambandið í Føroyum ikki er eins fyri allar føroyingar. Tí er neyðugt at bava eina heimild at víkja frá meginregluni, tá serlig viðurskifti gera seg galdandi. Slíkar heimildir bava okkara grannalond eisini ásamtmað eru

neyðugar. Um hendan heimildin ikki var við í lógini, kundu tey á smærri plássunum - har dagligt ferðasamband ikki er - helst kravt at postvinnurekandi skipaðu fyri dagligum postflutningi við at útvega sær flutningsmál sjálvur. Orðingin í stk. 4 er tó nakað meiri avmarkað í mun til hana í t.d. danir nýta.

Viðvíkjandi stk. 5 verður víst til viðmerkingarnar til § 4. Hugsast kann at ávísur flutningur, eitt nú meira ella minni reglulig útbering av handilsvørum, blómum v.m., eftir umstøðunum, kundi verið tulkað sum flutningur av posti. Landsstýrinum er tí eisini heimilað at áseta nærri reglur, soleiðis at sleppast kann undan tílíkum ivamálum. Sum sæst, er hetta petti víðari orðað enn § 4, stk. 6, tí her er nytt orðið "herundir...".

Til § 6

Tað er ikki óvanligt, at íbúgvar í londum við høgum postgjaldi, tá tað ræður um størri nøgdir av einsljóðandi sendingum, bera sendingarnar til annað land har postgjaldið er bíligari. Harfrá gongur leiðin so aftur til móttakara í upprunalandinum. Sambært nýggjastu útgávuni av UPC frá 1994 við gildi frá 1. jan. 1996, er tílík regla komin fyri øll limalond.

Til § 7

Greinin skilar til, at tað er landsstýrismaðurin, sum hevur ábyrgdina av at skyldur landsins eftir § 5 verða uppfyltar. Fyri at hava eitt amboð til hetta, er honum heimilað at áleggja øllum postvinnurekandi treytir, sum svara til tær skyldur landið hevur eftir nevndu §. Hetta kunnu vera treytir um at postvinnurekandi skullu átaka sær postflutning av adresseraðum brøvum, pakkum og blindalestri, ið verður sendi uttaneftir til Føroya og øvugt. Somuleiðis kann landsstýrismaðurin eftir hesi § áleggja postvinnurekandi at átaka sær innlendis flutning av sendingum, nevndar undir § 5, stk. 2, litra a)-f). Við hesum skuldi tann støðan ikki fremjað, at landið hevði skyldur, sum ongin var til at lúka. Her skal viðmerkjast at treytirnar kunnu áleggjast bæði teimum, sum virka á frælsum øki (§ 8) og á konsessióneraðum øki (§ 9). Postvinnurekandi á frælsum øki og á konsessiónerað um øki hava haraftrat nakrar felags treytir, teimum kunnu verða álagdar. Hesar treytir eru nevndar undir § 7, stk. 2, litra a)- j).

Til § 8

Landið hevur, sum nevnt undir § 4, einkarrætt til postflutning av ymsum sendingum upp til 20 kg. Í sjálvari lógini eru nøkur øki longu fræls, smb. § 4, stk. 2. Haraftrat heimilar § 8 landsstýrismanninum í kunngerð at undantaka ávísar partar av postflutninginum frá einkarrættinum. Lógin er soleiðis skipað, at tað skal vera møguligt heilt at avtaka einkarrættin. Er loyvi veitt á øki, sum ætlanin er at gera frælst, skal tann, sum loyvið hevur, hoyrast, áðrenn økið verður undantikið, men hoyringin er ikki bindandi fyri landsstýrismannin.

Til § 9

Annar møguleikin landsstýrismaðurin hevur til at lúka treytirnar til postflutning, er at veita loyvi. Loyvið kann latast við ella uttan einkarrætti. T.v.s. at møguleiki er fyri at fleiri fáa loyvi á sama øki. Generelt er sett sum krav, at loyvistreytirnar skulu vera sakligar og glærar. Hetta er meginregla, sum ES eisini nýtir.

Hóast heimildin at veita loyvi umfatar øll einkarrættindi landsins, herundir eisini rættin til útgávu av frímerkjum, verður tað hildið óhugsandi, at hesin rættur verður latin meira enn einum, um landið ikki ger av at varðveita hendan rættin hjá sær sjálvum. Frímerkjamarknaðurin er sera viðbrekin millum savnarar, ið lættliga kunnu missa áhugan fyri føroyskum frímerkjum, fáa teir bert illgruna um at vera "misbrúktir" við útgávum í tíð og ótíð.

Tíl tess at tryggja sær, at hann ið søkir um loyvi, er førur fyri at átaka sær hesa uppgávu, eru í stk. 2 settar treytir, sum skulu lúkast áðrenn loyvið verður veitt. Umframt felagstreytirnar í § 7, kunnu fleiri sertreytir áleggjast loyvishavara. Í stk. 3 eru nøkur dømi nevnd. Undir litra c) kann loyvishavara t.d. verða álagt at avgreiða serstakan postflutning, sum onki gevur av sær ella sum gevur hall. Her er tí dømis talan um flutning av blindalestri, sum sambært UPC skal vera ókeypis. Onnur dømi nevnd í UPC, eru postflutningur millum postverk av egnum posti og postflutningur til og frá krígsfangum o.l.

Til § 10

Eftir hesa § hevur landsstýrismaðurin heimild til at taka eitt loyvi aftur, um so er, at loyvishavarin brýtur lógina, kunngerðir ella aðrar reglur givnar við heimild í lógini ella loyvistreytirnar. Fyri at ikki hvørt smáting skal kunna hava við sær, at loyvið verður tikið aftur, ásetir stk. 2, at loyvishavarin skal hava freist at rætta fyri sær. Freistin er ikki ásett her, men er tengd at brotinum. Lættari brotið er at rætta, styttri kann freistin vera. Ein annur háttur at streingja á at láta brek rættað, er at áleggja loyvishavaranum dagbøtur, smb. stk. 3.

Til § 11

Vanliga kunnu øll rættindi av fíggjarligum slagi verða flutt, eitt nú verða avhendað ella ganga í arv, eins og rættarsókn kann verða gjørd í teimum. Tó eru nøkur undantøk frá hesi meginreglu, t.d. rættindi av persónligum slagi.

Áðrenn landsstýrismaðurin veitir loyvi, skal hann eftir § 9, stk. 2 tryggja sær, at umsøkjari er fíggjarliga og yrkisliga førur fyri at reka postflutning. Hesi krøv eru tengd at ávísum persóni ella felag og tí eiga rættindi sambært loyvinum ikki at kunna flytast øðrum, uttan loyvi er fingið frammanundan.

Vanliga fatanin var, at heimastýrið ikki kundi lóggeva uttanfyri tey mál, ið beinleiðis vóru yvirtikin. Eftir hesi uppfatan kundi tað verið ivingarsamt, um heimild var í løgtingslóg at seta bann fyri áttøku ella útpanting v.m. Seinastu árini hava ríkismyndugleikarnir í fleiri førum tulkað heimastýrislógina á ein frælsari hátt. Hátt nú hava teir góðkent tað sjónarmið, at heimastýrismyndugleikarnir á yvirtiknum málsøkjum kunnu seta reglur í verk, sum taka inn í felagslóggávu.

Til § 12

Hendan reglan er sett í lógina, sum eitt lið í landsstýrisins trygging av, at allir partar av landinum, fáa eina góða posttænastu. Av tí at ein møgulig kapping helst verður størst á meginøkjunum, skal heimild vera at krevja gjald av teimum ið virka har, til tess at tryggja útjaðaraøkini. Víst verður annars til viðmerkingarnar omanfyri undir § 3.

Til § 13

Hóast meginreglan í UPC er tann, at sendari hevur ræði á posti inntil posturin er útflyggjaður, verður her ásett, at fráboðan til móttakaran er avgerandi fyri nær ræðið gongur yvir til móttakaran. Hetta er grundað á, at Danmark í sínt tíð tók fyrivarni móti konventiónsregluni tí hon ikki var samsvarandi donskum rætti. Hildið verður neyðugt at hava somu reglu í Føroyum.

Til § 15

Eftir galdandi postlóg § 24, fellur ágóðin av posti, ið ikki kann avgreiðast, Postverki Føroya til. Av tí at nýggja lógin letur upp fyri møguleikunum fyri fríari kapping og talan sostatt kann vera um fleiri postvinnurekandi, verður her skotið upp, at ágóðin fellur landinum til.

Til § 16

Hendan reglan hevur sín uppruna í UPC. Tað verður hildið at vera beint, at tað almenna hevur heimild at nokta útbreiðslu av ella medvirkan til útbreiðslu av tílíkum evnum og tilfari.

Til § 17

Eisini hendan reglan hevur sín uppruna í UPC.

Til § 18

Roknað verður við, at postvinnurekandi í neyðugan mun gera avtalur við flutningsfeløg, sum t.d. skipa- og flogfeløg, um at taka post við. Skuldi tað hent, at tílík avtala ikki fekst feløgini millum, eigur landið at hava heimild til at áleggja flutningsfeløgum at taka skyldubundnan post við fyri rímiliga samsýning.

Til § 19
Stk. 1 hevur til endamáls at lætta um postavgreiðslu og tryggja, at postur kemur óskaddur fram.

Stk. 2 er serliga ætlað til nytslu, bar viðurskiftini eru soleiðis háttað, at postútbering kann gerast lættari við uppseting av felagspostkassum. Hetta kann serliga koma upp á tal í frítíðarøkjum, størri íbúðarhúsum og felagsbygging.

Til § 20
Tann tagnarskylda, sum sambært galdandi lóg liggur á Postverk Føroya, er víðkað til nú at fevna um øll tey, sum fáast við postflutning, sum t.d. postvinnurekandi, starvsfólk teirra og møguligir undirarbeiðstakarar við starvsfólki. Tagnarskyldan fevnir um hvør sendir og fær post og hvat í postinum er, og stendur við eisini eftir at starvssettur hjá postvinnurekandi v.m. er farin úr arbeiði.

Til § 21
Í galdandi postlóg er endurgjaldsspurningurin nærri útgreinaður í §§ 27-42. Í nýggjari posttøggávu er vanligt at skipa endurgjaldsreglurnar í kunngerð ella viðskiftatreytum. Um okkara leiðir eru tað bert íslendingar, sum hava varðveitt gomlu skipanina.

UPC hevur sera gjølligar reglur um endurgjald, skipað eftir hvat slag av sendingum talan er um, og hvørjir skaðarnir eru. Til tess at lætta um hjá viðskiftafólki, kann landsstýrismaðurin áleggja postvinnurekandi at hava endurgjaldsreglurnar við í viðskiftatreytum sínum. Tær reglur talan her er um, verða í øllum førum minstatreytir at lúka krøvunum í UPC. Tað er postvinnurekandi frítt fyri at bjóða betri treytir.

Postvinnurekandi veita vanliga ikki endurgjald fyri seinkaðan ella horvnan vanligan brævapost. Fyri pakkar eru ávísar avmarkingar í støddini av endurgjaldinum, tá tað ræður um skaddan ella horvnan post og endurgjald verður ikki veitt fyri seinking.

Til § 22
Av tí at postflutningur má metast sum tyðandi samfelagsmál, verður tað hildið neyðugt, nú møguleikar verða skaptir fyri frælsari kapping á hesum øki, at privatir postvinnurekandi hava skrásetingarskyldu til tess at gera eitt ávíst eftirlit møguligt.

Eftir stk. 5 kann landsstýrismaðurin lata øðrum upp í hendur at útinna skráseting og eftirlit. Her verður hugsað um annan almennan stovn, sum hóskandi kann átaka sær uppgávuna. Mett verður ikki, at tørvur er á nýggjum almennum stovni at taka sær av hesum uppgávum.

Til §§ 23 og 24
Í § 24 verða tær revsireglur, ið eru galdandi fyri tey sum virka í almennari tænastu víðkaðar til eisini at galda fyri privat postvinnurekandi og starvsfólk teirra. Sí viðm. til § 20.

Í viðgerð fríggjadagin 13. mars 1998. Uppskotið varð beint í mentanarnevndina.

Málið fall burtur sbr. stýrisskipanarlógini § 15 stk. 3, tí at løgtingsval var 30. apríl 1998, og málið ikki var liðugt viðgjørt á tingi fyri valið.

F.L. j.nr. 1900-2/95

149 Uppskot til løgtingslóg um umlegging av Postverk Føroya til partafelag

Ár 1998, hósdagin 5. mars, legdi Eilif Samuelsen, landsstýrismaður, vegna Ivan Johannesen, landsstýrismann, vegna landsstýrið fram soljóðandi

Uppskot
til
løgtingslóg um umlegging av Postverk Føroya til partafelag

Endamál lógarinnar

§ 1. Endamál lógarinnar er at umskipa almenna stovnin Postverk Føroya til eitt partafelag sum m.a. tekur við núverandi uppgávum Postverksins.

Stk. 2. Felagið verður stovnað við tí endamáli at reka postvirksemið og aðra vinnu sum hevur samband við hetta virksemið. Felagið kann veita aðrar tænastur innan skiftis- og samskiftisøkið. Harumframt kann postverkið á posthúsum veita annað virksemið við atliti til at halda uppi eina landsfevnandi posthússkipan.

Yvirtøka av ogn og skuld v.m

§ 2. Avvarandi landsstýrismanni er heimilað at stovna partafelag, P/F Postverk Føroya, við gildi frá 1. januar 1998 og at leggja felagnum til alla ogn og skuld, rættindi og skuldbindingar hjá Postverkið Føroya. Heimildin er avmarkað til at seta upp til 200 mió. kr. í felagið.

Stk. 2. Við stovnan felagsins heldur virksemi Postverksins uppat.

Stk. 3. Landið tryggjar innistandi á postgirokonti svarandi til trygdarreglurnar í L. nr. 850 af 23. sept. 1987 um en indskydergarantifond við seinni broytingum og kunngerðum givnar eftir somu lóg. Landsstýrismanninum er heimilað í kunngerð at áseta nærri reglur í hesum sambandi.

Stovnan av felagi v.m

§ 3. Partapeningurin verður við stovnan felagsins 75% av eginognini samsvart grannskoðaðari byrjunarfíggjarstøðu og metingarfrágreiðing pr. 1. januar 1998, rundað til næsta 5 milliónir.

Stk. 2. Partapeningurin verður ogn landsins, og kunnu partabrøvini ikki avhendast, uttan við løgtingslóg.

Skattligar avleiðingar

§ 4. Byrjunarfíggjarstøðu og metingarfrágreiðing, smb. § 3, stk. 1, verða óbroyttar at leggja til grund í skattleggingini av partafelagnum.

Starvsfólkaviðurskifti

§ 5. Nýggja felagið tekur við skyldum og rættindum Postverksins mótvegis teimum starvssettu.

Gildiskoma v.m.

§ 6. Henda lóg kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

Viðmerkingar

Fyri at tryggja hóskandi postflutning millum tey ymsu plássini í Føroyum, setti landsstýrið seinasta heyst ein arbeiðsbólk at gera uppskot til nýggja lóggávu fyri postflutningsøki. Í hesum liggur viðurkenningin av, at tað hevur stóran týdning fyri borgararnar sum heild og fyri vinnulívið, at teimum verður tryggjað so góðan postflutning, sum tað nú her til, og at vit ikki fáa ósømiligar stórar munir á hesum øki. Atgongd til postflutning hevur týdning fyri trivnað og mentan, fyri kappingarførið hjá vinnulívinum, og fyri at partar av landinum ikki vera fyri fyri óhóskandi trivnaðarligum og vinnuligum vanbýti.

Á samskiftisøkinum sum heild og herí eisini á postflutningsøkinum fer fram ein ovurhonds stór menning umframt liberalisering, og fyri at tryggja at Føroyar ikki verða eftirbátur á hesum sera týdningarmikla øki, helt landsstýrið tað vera rætt at seta nevnda arbeiðsbólk at gera uppskot til nýggja lóggávu innan hetta virksemi.

Arbeiðsbólkurin skuldi grunda lógaruppskot sítt á hesar meginfyritreytir:

1) Landsstýrið fær einkarrætt til postflutning.
2) Landsstýrið kann veita konsessión til postflutning og -virksemi.
3) Postverk Føroya verður gjørt til eitt partafelag.

Bólkurin varð settur við umboðum frá Samskiftisdeildini í Vinnumálastýrinum og Postverk Føroya. Arbeiðsbólkurin metti tað vera rættast við tveimum lógum fyri øki. Eina sum regulerar sjálvt postvirksemi og eina sum regulerar umleggingina av Postverki Føroya.

Lógaruppskotið um postvirksemi heimilar landsstýrinum, at veita felagnum konsessión til at reka postvirksemi. Her skal nevnast beinanvegin at landsstýrið ætlandi fer at veita nýggja P/F Postverkið Føroya konsessión til alt tað virksemi sum núverandi Postverkið hevur.

Høvuðsinnihaldið í lógini er annars, at Postverk Føroya verður umskipað frá einum almennum stovni til eitt partafelag, sum landið eigur allan partapeningin í.

Hetta verður gjørt á tann hátt, at partafelagið yvirtekur alla ogn og skuld hjá Postverkinum.

Partafelagið verður stovnað við sonevndum apportinnskoti.

Tekning av partapeningi samb. partafelagslógina kann annaðhvørt fara fram við kontantum inngjaldi ella við at onnur virðir(fastar ognir, leysafæ v.m.) verða skotin inn(apportinnskot). Ætlanin er at skjóta ogn og skuld Postverk Føroya inn í felagið.

Um slíka stovnan av partafelagi eru greiðar reglur í partafelagslógini, sum serliga tryggja ognarum og øðrum uttanfyristandandi, at teir kunnu líta á fíggjarligu upplýsingarnar í stovningartilfarinum.

Tí verða krøv sett um, deils, at byrjunarfíggjarstøðan sýnir veruligu virðini, og deils, at gjørd verður ein serlig metingarfrágreiðing, sum av óheftum metingarmonnum hvørs rættleiki skal váttast av grannskoðara.

Stovningardagurin er 1. januar 1998 og fellur sostatt saman við endanum av roknskaparárinum hjá Postverkinum.

Fíggjarstøðan í roknskapinum, saman við byrjunarfíggjarstøðuni og metingarfrágreiðingini, verða sostatt grundarlagið undir, hvussu stór eginogn felagsins er við stovnan.

Ætlanin er, at 75% av eginogn hjá Poskverkinum verður partapeningur, meðan restin verður frí eginogn. Tá landið umleggur ein almennan stovn til eitt partafelag, er tað heilt avgerandi at tryggleiki er fyri at tær ognir sum verða skotnar inn í felagið verða nágreiniligar lýstar og virðini eigur eingin ivi at verða um.

Fyri tað fyrsta skal viðmerkjast:
Mannagongdin við stovnanina av einum partafelagi við apportinnskoti har *dirvroknskapur, byrjunarfíggjarstøða og metingarfrágreiðing* lýsa øll fíggjarlig viðurskifti, tryggja sum omanfyri nevnt, at hetta mál verður rokkið.

Serligt er at viðmerkja at partafelagslógin júst ásetur at tá metingarfrágreiðingin verður gjørd verður støði undir virðismetingini tikið í *handilsvirðinum* sum ognirnar hava.

Fyri tað næsta skal viðmerkjast:
Við at leggju ognirnar hjá Postverkinum inn í eitt partafelag sum landið eigur allan partapeningin í liggur júst tryggleiki fyri at landið fær fullan valuta fyri peningin, tí landið fær einsamalt partabrøv fyri tær ognir sum verða skotnar inn.

Støðan hevði verið ein heilt onnur um aðrir enn landið, samstundis sum felagið var stovnað, høvdu rætt til at tekna partapening, men hetta er júst ikki støðan.

Júst við tí skipan her er talan um, fær landið fulla trygd fyri at tað hevur fingið fullt virði fyri ognirnar. tí partabrøvini eru berurar av virðinum. Kursvirði á partabrøvunum(innara virði) speglar til hvørja tíð landsins ogn í partafelagnum.

Skuldi tað hent, at ognirnar vóru ov *høgt* virðismettar, tá tær vóru lagdar inn í felagið, so hava partabrøvini tilsvarandi minni handilsvirði fyri landið sum partaeigara.

Skuldi tað hent, at ognirnar vóru ov *lágt* virðismettar, tá tær vóru lagdar inn í felagið so hava partabrøvini tilsvarandi lægri handilsvirði fyri landið sum partaeigara.

Javnvág er og landið fær júst tryggleika fyri tað veruliga virði.

Eitt slíkt virði kann ongantíð fastleggjast við fullari vissu við stovnanina, tá tað av góðum grundum fer virðismeting fram og ein virðismeting er og kann ongantíð verða meira enn ein meting.

Hinvegin verður vissan fingin fyri virðinum í tí løtu landið skuldi tikið avgerð um at selt partabrøvini til privatar, tí tá vera tey seld til hægstbjóðandi og kursurin tarvið staðfestur.

Landið "avreiðir" tí ikki nøkur virði.

Skuldi tað hent at landið onkuntíð seinni tók avgerð um at heilt at privatisera partafelagið, og selja partabrøvini, fær landið í sølupeningi júst tað fyri partabrøvini sum tey eru verd.

Skuldi tað hent at landið onkuntíð seinni tók avgerð um at deilvíst at privatisera, soleiðis at landið varðveitti nakað av partapeningginum men opnaði møguleikan hjá privatum at nýtekna partapening vildi slík nýtekning heldur ikki verið nøkur "avreiðing" av virðum frá tí almenna til privatar, tí tekningarkursurin verður svarandi til "innara virði".

Lógaruppskotið fevnir bert um tríggjar ásetingar, sum partafelagslógin annars fyriskipar, nevniliga

* navn,
* endamálsorðing og
* partapening.

Restina tekur aðalfundurin avgerð um, herundir samrykt av viðtøkum og broytingar av teimum. Tá lógin hevur ásett navn, endamál og reglur um, at partapeningurin ikki kann seljast, skulu viðtøkurnar gerast í neyvum samsvari við hetta, og kann aðalfundurin ikki broyta ásetingarnar í viðtøkunum um hesi viðurskifti.

Sum tað sæst, er í uppskotinum eingin áseting um leiðsluna av nýggja felagnum - nevnd og stjórn. Hetta eru viðurskifti, sum sambært partafelagslógini skulu skipast í viðtøkunum, og tað er aðalfundurin, sum avger innihaldið í viðtøkunum. Tað verður hildið óneyðugt í lógini at áseta reglur um tal og val av nevndarlimum. Her skal viðmerkjast, at sambært partafelagslógini hevur starvsfólkið í nýggja felagnum rætt til at velja nevndarlimir.

C. Fíggjarligar avleiðingar

Lógaruppskotið hevur ikki eyka fyrisitingarligan kostnað við sær.

Inntøkur:
Inntøkur landskassans eftir umskipanina av Postverkinum til almennt partafelag fara at stava frá

- konsessiónsgjaldi,
- partafelagsskatti og
- vinningsbýti.

Konsessiónsgjald:
Sambært lógini um Postvirksemi kann landið áleggja konsessiónshavarum at gjalda konsessiónsgjald, sum er árligt gjald fyri rættin til at reka postvirksemi. Tann er ikki avgjørt hvat konsessiónsgjaldið fyri Postverkið skal verða

Partafelagsskattur:
Umskipanin av Postverkinum hevur við sær, at felagið kemur undir vanligan partafelagsskatt, sum í dag er 27% af skattskyldugu inntøkuni.

Ilt er at meta um, hvussu stórar skattainntøkurnar verða hvørt árið, tí tær eru beinleiðis tengdar at rakstrarligu gongdini, fløgum og skattligum avskrivingum.

Vinningsbýti:
Av tí at allur partapeningurin sambært uppskotinum er ogn landskassans, fellur møguligt vinningsbýti til landskassan. Ársaðalfundurin ger av støddina á vinningsbýtinum.

Útreiðslur:
Sum er, ábyrgist landskassin fyri øllum skyldum Postverksins, meðan tað verður partafelagið sjálvt, sum ábyrgist fyri sína skuld eftir umleggingina.

Hetta hevur sum meginreglu við sær, at landskassin ikki hevur nakrar útreiðslur av at Postverk Føroya verður umskipað til partafelag.

Viðmerkingar til tær einstøku greinirnar
Til § 1
Greinin sigur, at endamálið við lógini er at leggja Postverk Føroya um til partafelag, sum m.a. tekur við núverandi uppgávum Postverksins. Hetta seinasta er likið við fyri at undirstrika at stovnanin av nýggja felagnum ikki fer at hava við sær at t.d. útjaðararoykini fáa eina vánadigari postflutning enn tey hava í dag. Annars skal viðmerkjast at tað er lógin um postvirksemi, sum regulerar hesi viðurskiftini nærri.

Til § 1, stk. 2
Stk. 2 í § 1 sigur at endamálið hjá hesum nýggja felag, er at reka postvirksemi. Soleiðis tryggjar landið sær at nýggja felagið ikki fer í holt við aðra vinnu, sum kanska kundi forkomi felagnum. Um so er at felagið ynskir at fara í aðra vinnu enn postvinnu, krevst lógarbroyting. Tó er í seinasta punkti ein heimild til at lata postverkið reka tænastur sum mugu metast neyðugar til tess at tryggja smáplássunum posthús. Til dømis kann verða nevnt møguleikin at reka ein handil á staðnum, har tað annars hvørki hevði verið handil ella posthús.

Til § 2
Aðalfundurin kann ikki broyta navnið á partafelagnum, tí navnið er ásett í lógini. Hinvegin er einki til hindurs fyri, at aðalfundurin samtykkir, at felagið fær sær ynskt undirnavn, sum kunnu verða hent, serliga tá ræður um samskifti við útlond. Somuleiðis er felagnum loyvt at stovna dóttirfelóg, treyta av at endamál teirra er innan lógarinnar karmar.

Høvuðsinnihaldið er, at øll ogn og skuld postverkstns verður flutt til partafelagið.

Tá tað ræður um ognir og rættindi, kunnu hesi flytast til partafelagið, uttan at skuldararnir hava givið teirra samtykki.

Hetta er ein meginregla í avtalurættinum, og tí slamdast eingir trupulleikar av hesum.

Tá tað ræður um skuld og skuldbindingar, er beint øvugt.

Her er meginreglan, at skuld ikki við frígerandi virkaingi kann flytast frá postverkinum til partafelagið.

Fyri at flyta skuld krevst loyvi frá honum, ið kravið hevur. Kravánararnir kunnu - uttan nakra grundgeving - nokta, at annar skuldari kemur í staðin. Verður skuldin flutt uttan loyvi frá kravánara, er meginreglan, at postverkið og partafelagið hefta solidariskt fyri skuldini.

Ikki er óhugsandi, at onkur kravánari fyri at bøta um eina vantaliga avtalu, sytir skuldarskiftinum fyri at samnáða seg til betri spmdir. Hendir tað, verða slíkir kravánarar innfríaðir.

Til § 2, stk. 3
Her er talan um at landið varveitir tær skyldur tað hevur í dag, mótvegis teimum tá eiga innistandandi á postgirokonti. Tað hevur verið hildið rímiligt, at tey ið eiga innistandandi á postgirokonti verða javnstillaði við tey ið eiga pening hjá peningastovnunum. Við at vísa til Garantifonden er hetta máttið rokkið.

Til § 3
Av samlaðu eginognum felagsins skal ein partur vera partapeningur og ein partur fríar ognir.

At partapeningurin verður skorin upp til 75% av eginognini, er tí, at tnett verður, at eitt tílíkt lutfall millum eginogn og partapening er hóskandi fyri eina tílíka fyritøku.

At felagið verður stovnað við hesum partapeningi, er tó ikki til hindurs fyri, at partapeningurin sum frá líður verður tillagaður skiftandi tørvi og umstøðum.

Til § 3, stk. 2
Her verður ásett, at allur partapeningurin í nýggja felagnum verður ogn landsins, og er hetta at skilja sum tann til hvørja tíð verandi partapeningur, eisini eftir møguligar hækkingar.

Við hesi grein verður tryggjað, at privatisering av partafelagnum ikki kann fremjast uttan at løgtingið samtykkir løgtingslóg um hetta.

Til § 4
Reglan ger endaliga upp virðini á ogn og skuld, tá um skatting ræður.

Til § 5
Eftir lógaruppskotinum § 2 yvirtekur nýggja felagið rættindir og skyldur, sum Postverk Føroya hevur. Hetta merkir eisini at tær skyldir sum liggja í Postverkinum mótvegis starvsfólkinum, verða yvirtiknar. Av tí at "skyldir og rættindi" kunnu vera so mangt, hevur landsstýrið hildið tað verið rættast, at seta sjálvstøðuga grein um skyldur felagsins mótvegis starvsfólkunum.

1. viðgerð fríggjadagin 13. mars 1998. Uppskotið varð beint í mentanarnevndina.

Málið fall burtur sbr. stýrisskipanarlógini § 15 stk. 3, tí at løgtingsvalið var 30. apríl 1998, og málið ikki var liðugt viðgjørt á tinginum fyri valið.

F.L. j.nr. 1900-2/95

150 Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um støðisútbúgving innan tøkni

Ár 1998, hósdagin 5. mars, legði Eilif Samuelsen, landsstýrismaður, vegna landsstýrið fram soljóðandi

Uppskot
til
løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um støðisútbúgving innan tøkni

§ 1.

Í løgtingslóg nr. 47 frá 28. apríl 1992 um støðisútbúgving innan tøkni sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 67 frá 20. mai 1996 verða gjørdar hesar broytingar:

1) § 1, stk. 1 verður orðað soleiðis:
"Landsstýrismanninum verður heimilað at skipa fyri støðisútbúgving innan tøkni."

2) § 3, stk. 1 verður orðað soleiðis:
" Landsstýrismaðurin ásetur almennar reglur um støðisútbúgvingina eftir ummæli frá yrkisútbúgvingarráðnum."

3) § 3, stk. 2 verður orðað soleiðis:
"Stk. 2. Landsstýrismaðurin ásetur eftir ummæli frá yrkisútbúgvingarráðnum, jbr. løgtingslóg um yrkisútbúgvingar, reglur um floksdeildir, samstarv millum skúlar um býti av flokkum og útbúgvingum og um upptøku av næmingum."

4) § 4, stk. 1 verður orðað soleiðis:
"Støðisútbúgvingin verður skipað í einum við atlit til at lúka krøvini um upptøku til framhaldandi útbúgving innan tøkni og til yrkisútbúgving."

5) § 6, stk. 1 verður orðað soleiðis:
"Landsstýrismaðurin ásetur, eftir ummæli frá yrkisútbúgvingarráðnum og eftir samtykt frá viðkomandi yrkisnevnd, jbr. løgtingslóg um yrkisútbúgvingar, hvørjar yrkislærugreinar og grundlærugreinar skulu verða í tí ávísu útbúgvingini."

6) § 6, stk. 2 verður orðað soleiðis:
"Stk. 2. Landsstýrismaðurin ásetur, hvørjar aðrar almennar lærugreinar skulu verða í útbúgvingini."

7) § 8, stk. 2 verður orðað soleiðis:
"Stk. 2. Landsstýrismaðurin ásetur eftir ummæli frá yrkisútbúgvingarráðnum reglur um prøvtøku fyri hvørja lærugrein sær. Í yrkislærugreinunum tó eftir samtykt frá viðkomandi yrkisnevnd."

8) § 9, stk. 3 verður orðað soleiðis:
"Stk. 3. Landsstýrismaðurin ásetur eftir ummæli frá yrkisútbúgvingarráðnum reglur fyri stk. 1 og 2."

§ 2.

Henda lóg kemur í gildi 1. august 1998.

Viðmerkingar

Galdandi lóg er frá 28. apríl 1992, og er hetta fyrstu ferð, at eitt lóg um støðisútbúgving innan tøkni er sett í gildi. Broyting í lógini í sambandi við nýggju stýrisskipanina kom í gildi 20. mai 1996.

Um støðisútbúgvingina innan tøkni kann í høvuðsheitum sigast, at hon gevur ungum møguleika at byrja eina tøknilíga útbúgving, har tað eftir lokið støðisár ber til at halda fram í víðari útbúgving innan tøkni og handverk.

Nýskapanin við broytingaruppskotinum er í høvuðsheitum, at yrkisútbúgvingarráðið, sum verður sett á stovn í sambandi við nýggju yrkisútbúgvingarlógina, hevur ummælisrætt, tá ið tað snýr seg um innihaldið í støðisútbúgvtingini.

Mett verður, at uppskotið fer ikki at hava fíggjarligan meirkostnað fyri landskassan.

Hetta lógaruppskot er viðgjørt á sama hátt og løgtingslógaruppskotið um yrkisútbúgvingarlógina. Partarnir á arbeiðsmarknaðinum hava tikið støðu til bjálagda SIT-lógaruppskot, og tað varð tí ikki sent arbeiðsmarknaðarpørtunum til ummælis.

Serligar viðmerkingar

Ad 1) Heimildin at skipa fyri støðisútbúgving innan tøkni er smb. § 2 í rammulóg nr. 54 frá 14. februar 1979.

Ad 2) Smb. verandi skipan stendur einki um ummælisrætt. Í broytingaruppskotinum er tað yrkisútbúgvingarráðið, jbr. løgtingslóg um yrkisútbúgvingar, sum hevur henda ummælisrætt.

Ad 3) Eins og undir punkt 2) er tað yrkisútbúgvingarráðið, jbr. løgtingslóg um yrkisútbúgvingar, sum hevur henda ummælisrætt.

Ad 4) Hendan broyting er tikin við fyri at næmingar, sum hava tikið støðisútbúgving innan tøkni, kunnu halda fram í einari yrkis- ella lærlingaútbúgving.

Ad 5) Smb. verandi skipan er einki ásett um nakran ummælis- ella avgerðarrætt viðvíkjandi spurninginum um, hvørjar yrkislærugreinar og grundlærugreinar skulu verða í tí ávísu útbúgvingini. Í broytingaruppskotinum fær yrkisútbúgvingarráðið, jbr. løgtingslóg um yrkisútbúgvingar, ummælisrættin og yrkisnevndirnar, jbr. somu lóg, avgerðarheimildina.

Ad 6) Hendan ásetting heimlar landsstýrismanninum at upprætta almennar lærugreinar í støðisútbúgvingini, sum hann metir eru av týdningi fyri útbúgvingina.

Ad 7) Smb. verandi skipan er einki ásett um nakran ummælis- ella avgerðarrætt viðvíkjandi spurninginum um prógvtøkur fyri hvørja lærugrein sær. Í broytingaruppskotinum fær yrkisútbúgvingarráðið, jbr. løgtingslóg um yrkisútbúgvingar, ummælisrættin og yrkisnevndirnar, jbr. somu lóg, avgerðarheimildina.

Ad 8) Smb. verandi skipan er einki ásett um nakran ummælisrætt viðvíkjandi spurninginum um avriksflutning/góðskriving av faki. Í broytingaruppskotinum fær yrkisútbúgvingarráðið, jbr. løgtingslóg um yrkisútbúgvingar, henda ummælisrætt.

1. viðgerð hósdagin 12. mars 1998. Uppskotið verður beint í mentanarnevndina.

Málið fall burtur sbr. stýrisskipanarlógini § 15 stk. 3, tí at løgtingsval var 30. apríl 1998, og málið ikki var liðugt viðgjørt á tingi fyri valið.

F.L.jnr. 2116-18/96

151 Uppskot til løgtingslóg um yrkisskúlar

Ár 1998, hósdagin 5. mars, legði Eilif Samuelsen, landsstýrismaður, vegna landsstýrið fram soljóðandi

Uppskot
til
løgtingslóg um yrkisskúlar

Kapittul 1
Góðkenning av yrkisskúlum o.a.

§ 1. Landsstýrismaðurin kann góðkenna yrkisskúlar, hvørs endamál er

a) at geva undirvísing í yrkisútbúgvingum eins og øðrum javnsettum útbúgvingum og skeiðvirksemi,
b) at menna útbúgvingarvirksemi, herímillum námsfrøðiligu uppgávur skúlans,
c) at menna tann einstaka næmingin og hjálpa viðkomandi til samfelagsliga fatan,
d) at nøkta tørvin hjá vinnuni, tá ið ræður um fakligan førleika og almennan kunnleika

§ 2. Yrkisskúlarnir skulu fylgja reglunum um næmingaupptøku, læraraførleika, prógvtøku eins og øðrum ásetingum, sum av landsstýrismanninum eru ásettar at gadda sambært løgtingslóg um yrkisútbúgvingar.
Stk. 2. Yrkisskúlarnir skulu fylgja ásetingunum um yrkisútbúgvingarráðið sambært løgtingslóg um yrkisútbúgvingar.
Stk. 3. Yrkisskúlarnir skulu samskipa øll undirvísingarviðurskifti so væl sum til ber innandyrsis, sínámillum og við aðrar samstarvspartar.

§ 3. Landsstýrismaðurin kann áseta treytir fyri góðkenningina. Yrkisskúlarnir verða skipaðir sum sjálvsognarstovnar, hvørs viðtøkur skulu góðkennast av landsstýrismanninum. Landsstýrismaðurin kann áseta gjøllari reglur um kunngerð og innihaldið í viðtøkunum.
Stk. 2. Landsstýrismaðurin kann taka aftur góðkenning av yrkisskúla, um so er, at tørvur ikki er á skúlanum. Somuleiðis kann ein góðkenning takast aftur, um skúli ikki heldur galdandi reglur ella givin boð.

§ 4. Landsstýrismaðurin kann nokta fyri, at ein yrkisskúli leggur niður ella tekur av góðkendar útbúgvingar.
Stk. 2. Verður ein yrkisskúli tikin av, skulu ognir skúlans latast til undirvísingar- og útbúgvingarendamál í samsvari við viðtøkurnar hjá avvarðandi skúla.

§ 5. Landsstýrismaðurin hevur eftirlit við og leiðbeinir yrkisskúlarnar og kann í hesum sambandi biðja um allar neyðugar upplýsingar um útbúgvingar, næmingar, lærarar og skúlans rakstur.

Kapittul 2
Leiðsluviðurskifti

§ 6. Eitt stýri verður valt við hvørn sjálvsognarstovn. Stýrið hevur 6 limir, sum verða valdir fyri 4 ár. Fyri hvønn stýrislim verður ein varalimur valdur.
Stk. 2. Limirnir í stýrinum verða valdir soleiðis:

a) Viðkomandi yrkisfeløg á arbeiðsmarknaðinum velja tilsamans 4 limir við javnstórari umboðan av arbeiðsgevarum og løntakarum.
b) Kommunan, har skúlin hoyrir heima, velur 1 lim.
c) Starvsfólk skútans velja 1 lim.

Stk. 3. Eitt umboð fyrt næmingaráðið kann luttaka á stýrisfundum uttan atkvøðurætt.
Stk. 4. Skúlastjórin er skrivari stýrisins og hevur uttan atkvøðurætt á stýrisfundum.
Stk. 5. Tá eitt stýri er valt, skal tað boða landsstýrismanninum frá, hvørjir limirnir í stýrinum eru. Broytingar í samansetingini av stýrinum skulu somuleiðis boðast landsstýrismanninum.
Stk. 6. Landsstýrismaðurin kann í serligum føri góðkenna eina aðra samansseting av stýrinum enn tá í stk. 1 og 2 nevndu.

§ 7. Stýrið er ovasta leiðsla á skúlanum og virkar samsvarandi viðtøkum stovnsins. Eftir tilmæli skúlastjórans staðfestir stýrið virksemið í einum skúlaári, eins og tað skal góðkenna skúlans rakstrar- ætlan og rokniskap.
Stk. 2. Stýrið ger av eftir tilmæli skúlastjórans, hvørjar góðkendar yrkisútbúgvingar og hvat skeiðvirksemi, skúlin skal bjóða.
Stk. 3. Stýrið skal ansa eftir, at virksemið verður so fjøltátað sum til ber, og at tað í størstan mun tryggjar vinnuni og tí einstaka atgongd til grundútbúgvingar, eftirútbúgvingar og framhaldsútbúgvingar innan virkisøki skúlans.
Stk. 4. Stýrið tekur avgerð eftir tilmæli skúlastjórans, um skúlin skal fara undir annað útbúgvingarvirksemi móti hóskandi gjaldi, enn tað, sum nevnt er frammanfyri.

§ 8. Landsstýrismaðurin setir og loysir úr starvi skúlastjóran eftir tilmæli frá stýrinum. Stýrið setir og loysir úr starvi lærarar í fastum starvi eftir tilmæli frá skúlastjóranum. Skúlastjórin setir og loysir úr starvi onnur starvsfólk skúlans.
Stk. 2. Stýrið kann áseta nærri reglur fyri virkisøki stýrisins og skúlastjórans. Tað hevur heimild til at geva skúlastjóranum fullmakt at taka sær av ávísum uppgávum, sum eru álagdar stýrinum.
Stk. 3. Stýrið setir og loysir úr starvi granskoðara skúlans.

§ 9. Stýrið hevur mótvegis landsstýrismanninum ábyrgdina av rakstri skúlans.

Stk. 2. Um stýrið við sínum avgerðum setir skúlans framhuld í vanda, kann landsstýrismaðurin avgera, at stýrið beinanvegin fer frá, og hann kann í hesum sambandi tilnevna eitt fyribils stýri, til eitt nýtt stýri er valt eftir skúlans viðtøkum.

Stk. 3. Um stýrið ikki fylgir bodum frá landsstýrismanninum um retting av merri ásettum viðureskiftum, kann landsstýrismaðurin avgera

1) at uppgávurnar hjá stýrinum heilt ella partvís verða roktar av persónum, sum landsstýrismaðurin hevur tilnevnt, ella
2) at stýrið fer frá, so at eitt nýtt stýri kann verða valt eftir viðtøkum skúlans.

Stk. 4. Avgerð um at reisa rættarsøk móti stýrislimum, leiðslu, grannskodarum ella øðrum orsakað av tapi, sum skúlanum hevur verið fyri, kann vera tikin av stýrinum ella landsstýrismanninum.

§ 10. Skúlastjórin er dagligur leiðari stovnsins og skal ansa eftir:

1. at útbúgvingarnar verða framdar samsvarandi galdandi reglum
2. at undirvísingarligu viðurskiftini á skúlanum eru í lagi
3. at tann av stýrinum góðkenda rakstrarætlanin verður hildin
4. at skúlans virksemi er samsvarandi avgerðum og ásetingum stýrisins

Stk. 2. Skúlastjórin letur stýrinum uppskot til virksemi skúlans fyri komandi rakstrarár.

Kapittul 3
Stuðul

§ 11. Landsstýrismaðurin útvegar stuðul til skúlans fyrisiting, leiðslu, rekstur av bygningum o.ø.

Stk. 2. Landsstrismaðurin útvegar góðkendum sjálvsognarstovni sambært hesi lóg stuðul til rakstur av skúlaheimi.

Stk. 3. Landsstýrismaðurin kann útvega góðkendum sjálvsognarstovni sambært hesi lóg stuðul til ny- ella umbygging av skúla ella skúlaheimi, stuðul til rentur og avdráttir av lánum og stuðul til útgerð til undirvísingarvirksemi.

Stk. 4. Landsstýrismaðurin kann veita hesum yrkisskúlum og skúlaheimum tryggd fyri lánum, sum eru tikin til ein part av skjalprógvaðum utreiðslum til ny- ella umbygging. Parturin verður ásettur á árligum fíggjarløgtingslógum.

Stk. 5. Landsstýrismaðurin kann áseta nærri reglur fyri tí í stk. 4 nevndu veiting av trygd.

§ 12. Landsstýrismaðurin kann halda aftur ella taka aftur stuðul, møguliga krevja stuðul aftur goldnan, um meytir fyri veiting av stuðli ikki verða hildnar.

§ 13. Kommunur kunnu lata stuðul til leguútreiðslur, tá yrkisskúli verður stovnaður, um- ella úthygdur. Stuðulin kann ikki verða latin sum lán.

Stk. 2. Rakstrarstuðul til lærlingaundirvísing verður rindaður við 80% frá landskassanum og 20% frá kommununum.

Stk. 3. Kommununnar partur av útreiðslunum til lærlingalærunna, smb. stk. 2, verður í fyrsta umfari at leggja út úr landskassanum og síðan býta millum kommununar eftir heimstaðnum, lærlingarnir høvdu, tá teir byrjaðu skúlan.

§ 14. Landsstýrismaðurin útvegar góðkendum sjálvsognarstovni rakstrarstuðul til alment góðkent undirvísingarvirksemi, sambært § 1, uttan so er, at tilskot til hesar útreiðslur verður veitt eftir viðkomandi útbúgvingarlóg.

Stk. 2. Landsstýrismaðurin ásetur nærri reglur um tey í stk. 1 nevndu viðurskifti.

§ 15. Landsstýrismaðurin kann áseta reglur um stødd á og nærmagongd fyri lutakaragjaldi fyri undirvísing og øðrum virksemi, sum ikki eru stuðulsheimilað eftir hesi lóg.

Stk. 2. Tá yrkisskúlin bjóðar út skeið ella annað virksemi, sum inntøkufíggjað virksemi, skal hann fylgja góðum marknaðartøktarsiði og má ikki volda øðrum útbjóðarum avlagandi kapping.

§ 16. Landsstýrismaðurin kann heilt ella lutvíst lata stuðul til menningar- ella royndarvirksemi ella til onnur, serlig endamál og iverksetan av nýggjum útbúgvingum í teimum í § 1 nevndu skúlum.

§ 17. Lønar-, setanar- og pensiónsviðurskifti hjá starvsfólkunum í yrkisskúlunum skulu fylgja teimum reglum, sum landsstýrið hevur avtalað ella ásett.

§ 18. Landsstýrismaðurin kann gera av, at yrkisskúlar skulu hava felags fyrisitingarliga skipan.

Kapittul 4
Roknskapur og grannskoðan

§ 19. Roknskapurin hjá sjálvsognarstovni sambært

hesi lóg skal gerast og setast upp samsvarandi ásetingunum um almennar roknskapir.

Stk. 2. Roknskapur stovnsins skal grannskoðast av løggildum grannskoðara. Grannskoðaður roknskapur og grannskoðarafrágreiðing skal sendast landsstýrismanninum.

Stk. 3. Grannskoðanardeild landskassans kann í sambandi við landsgrannskoðarina biðja um upplýsingar beinleiðis frá stýrinum.

Stk. 4. Um tað í grannskoðarafrágreiðingini, smb. stk. 2, verður víst á lógarbrot ella onnur óreglulig viðurskifti í sambandi við umsitingina av skúlans ognum, skal landsstýrismaðurin alt fyrt eitt, um grannskoðanin gevur orsøk til tess, seta í verk tiltøk, sum aftur tryggja lóglig viðurskifti og fullgóða umsiting. Sama er eisini galdandi, um landsstýrismaðurin á annan hátt verður gjørdur kunnugur við nevndu viðurskifti.

Kapittul 5
Ymsar ásetingar

§ 20. Eftir nærri reglum, sum landsstýrismaðurin ásetur, kunnu kærur yvir skúlans avgerðir leggjast fyri landsstýrismannin.

Stk. 2. Á hvørjum góðkendum yrkisskúla verður eitt næmingaráð skipað. Eftir tilmæli frá yrkisútbúgvingarráðnum ásetur landsstýrismaðurin reglur um val av næmingaráði og virksemi tess.

Kapittul 6
Gildiskoyti

§ 21. Henda lóg kemur í gildi 1. apríl 1998.

Stk. 2. Verandi stýri/nevndir fyri sjálvsognarstovnarnar sum henda lóg fevnir um, sita til 1. august 1998, tá nýggj stýri verða vald samsvarandi hesi lóg.

Stk. 3. Verandi viðtøkur stovnanna galda til 1. august 1998, tá nýggjar viðtøkur samsvarandi hesi lóg skulu verða latnar landsstýrismanninum til góðkenningar.

Stk. 4. Í løgtingslóg nr. 58 frá 2. oktober 1978 um skúlafyrisiting við seinni broytingum verða gjørdar hesar broytingar:

1) Kapittul 5 (§§ 23-26) verður strikað.

2) Í § 28 stk. 1 verða orðini "ella sjálvseigandi undirvísingarstovnar" strikað.

3) Í § 30 stk. 1 verða orðini "og við sjálveigandi undirvísingarstovnar" strikað.

4) Í § 31 stk. 1 verða orðini "ella sjálveigandi undirvísingarstovni" strikað.

Stk. 5. Løgtingslóg nr. 55 frá 14. desember 1965 um býti av kommununni parti av útreiðslunum til lærdingalæruna fer úr gildi.

Almennar viðmerkingar

Galdandi lógir og reglur um verandi yrkisskúlar (t.e. handils- og tekniskar skúlar, sum eru sjálvsognarstovnar) eru løgtingslóg nr. 58 frá 2. oktober 1978 um skúlafyrisiting við seinni broytingum, rammulóg "lov nr. 54 af 14. februar 1979 for Færøerne om handelsskoler, tekniske skoler samt maskinmester- og maskinistskoler, som sat i kraft på Færøerne ved bkg. nr. 363 af 9. august 1979" við seinni broytingum og viðtøkur skúlanna.

Sum er hevur landsstýrismaðurin heimild at góðkenna yrkisskúlarnar og viðtøkur teirra. Hesir skúlar verða leiddir av einum fyristøðumanni og eru undir eftirliti av einum serligum stýri. Sambært viðtøkunum skipar nevndin seg sjálv. Nevndin gevur landsstýrismanninum tilmæli um undirvísingarætlan, setan av fyristøðumanni og lærarum og loysn úr starvi av teimum. Somuleiðis ger nevndin í samráð við lærararáðið árliga fíggjarætlan fyri skúlan.

Hildið verður, at lógin um skúlafyrisiting tykist bert at vera ein lóg um fyrisiting av fólkaskúlanum heldur enn av øðrum skúlum. Tað er í hvussu er ein sannroynd, at lógarinnar kapitul 5, sum snýr seg um sjálveigandi stovnar, ikki hevur loyst allar kompetensuspurningar, sum hava stungið seg upp.

Funnist verður eisini at, at landsstýrismaðurin setir og loysir fólk úr starvi í yrkisskúlunum.

Í hesum lógaruppskotinum verður mælt til, at øll stýringin av yrkisskúlunum kemur inn í hesa lógirta. Sostatt verða tilsvarandi reglurnar í lógini um skúlafyrisiting strikaðar. Lógargrundarlagið verður felags fyri allar yrkisskúlar, talan er um eina dagføring av skipanini, so hon lykur neyðug og tíðarbóskandi krøv, sum í størst møguligan mun eru lagað til galdandi játtanar- og roknskaparkrøv.

Yrkisskúlarnir verða framhaldandi skipaðir sum sjálvsognarstovnar. Fyrimunirnir við at skipa ein skúla á henda hátt eru m.a., at stýringin av skúlunum verður miðfirað, og at vinnulívið sjálvt fær ábyrgdina fyri virksemi skúlans.

Samtvært fyriliggjandi uppskoti er skúlastjórin dagligur leiðari á stovninum. Hann verður bæði settur og loystur úr starvi av landsstýrismanninum eftir tilmæli frá skúlastýrinum. Skúlastýrið setir og loysir úr starvi lærarar í føstum starvi eftir tilmæli frá skúlastjóranum, meðan skúlastjórin setir og loysir úr starvi onnur starvsfólk skúlans.

Fyri hvønn skúla verður valt eitt stýri, sum er ovasta leiðsla á skúlanum. Tað verður valt av viðkomandi yrkisfeløgum á arbeiðsmarknaðinum, starvsfólkum skúlans og kommununi, har skúlin hoyrir heima. Stýrið, sum hevur 6 limir, velur sjálvt sín formann og varaformann millum sínar limir. Hetta virki er óheft av landsins myndugleikum og pørtunum á arbeiðsmarknaðinum. Men stýrið hevur tó ábyrgd í málum viðvíkjandi útbúgvingum og rakstri skúlans mótvegis landsstýrismanninum í undirvísingarmálum.

Um eitt stýri við sínum avgerðum setir skúlans framhald í vanda, kann landsstýrismaðurin avgera, at stýrið fer frá, og hann kann í hesum sambandi tilnevna eitt fyribils stýri, til eitt nytt stýri er valt eftir skúlans viðtøkum.

Somuleiðis er ásett, at um stýrið ikki fylgir landsstýrismansins boðum um rætting av nærri ásettum viðurskiftum, kann landsstýrismaðurin avgera, annaðhvørt at uppgávurnar hjá stýrinum heilt ella partvís verða røktar av persónum, sum hann hevur tilnevnt, ella avgera, at stýrið fer frá, so at eitt nytt stýri kann verða valt eftir viðtøkum skúlans.

Allar veitingar til omanfyri nevndu sjálvsognarstovnar verða veittar sum stuðul, sum skúlarnir og skúlaheimini sjálv skulu húsast við.

Lógaruppskotið fer ikki at hava nakran fíggjartigan meirkostnað fyri landskassan.

Ein listi yvir almennar stovnar o.o., ið hava havt uppskotið til ummælis, er hjálagdur. Høvuðsinnihaldið í ummælunum er í størst møguligan mun sett inn í lógaruppskotið.

Serligar viðmerkingar

Viðmerkingar til hvørja einstaka lógargrein

Ad. § 1. Landsstýrismanninum verður smb. § 2 í rammulóg nr. 54 frá 14. februar 1979 heimilað at skipa fyri lóg um yrkisskúlar.

Yrkisskúlar, sum higartil hava fingið játtan á fíggjarløglingslógini til alment góðkent virksemi, eru at rokna sum góðkendir, tá ið henda lóg er komin í gildi.

Ad. § 2. Galdandi reglur hesum viðvíkjandi eru í høvuðsheitum ásettar í útbúgvingarkunngerðum ella serligum kunngerðum. (Smb. stk. 1).

Ad. § 3. Fyðkenni fyri ein sjálvsognarstovn: 1) hann hevur eitt stovnsfar, sum fjarstøkt er útskilt frá stovnarans ella gevarans ognum. 2) hann hevur eitt ella fleiri endamál, sum eru lýst í viðtøkum stovnsins. 3) hann hevur eina sjálvstøðuga, óbeina leiðslu. 4) hann er ætlaður at virka í eitt langt tíðarskeið, vanliga tíðarávarkað. Men tað kann eisini verða ásett í viðtøkunum, at skeiðið er tíðaravmarkað.(Smb. stk. 1). Tað eru yrkisskúlarnir, sum skulu gera viðtøkurnar, sum smb. § 21, stk. 3 verða sendar landsstýrismanninum til góðkenningar. (Smb. stk. 1).

Talan kann verða um vantandi mentinga- ella lærlingaundirtøku. Ella radikalt broytt krav til førleika/kvalifikatiónir á arbeiðsmarknaðinum, at brúk ikki er ikki fyri skúlanum. (Smb. stk. 2).

Ad. § 4. Um stýrið á skúlanum metir, at yrkisskúli/útbúgving - t.d. av fíggjarligum orsøkum - skal niður leggjast, kann landsstýrismaðurin fyrða tí, um hann metir, at tørvur er á skúlanum/útbúgvingini. (Smb. stk. 1).

Er talan sum heild um at stovna, leggja niður ella at taka av útbúgvingar, skal yrkisútbúgvingarráðið gera tilmæli hesum viðvíkjandi. (Smb. stk. 2).

Ad. § 5. Viðkomandi undirvísingarstýri undir avvarðandi landsstýrismanni hevur tað yvirskipaða eftirlitið við øllum yrkisskúlum. Talan er bert um hagtalsupplýsingar um lærarar og næmingar. Talan er ikki um persónligar upplýsingar.

Ad. § 6. Valskeiðið sum stýrislimur er vanliga 4 ár og gongur frá fyrsta 1. apríl eftir hvørt kommunuval. Val til stýrið fer fyrst fram, tá ið henda lóg er lýst at hava gildi og gongur til 1. apríl eftir komandi kommunuval. Eingin kann verða valdur til stýrislim, eftir at hava fylt 67 ár. (Smb. stk. 1).

Stýrislimirnir verða valdir soleiðis:

Eru viðkomandi yrkisfeløg limir í meginfelag, velur meginfelagið umboðini eftir somu reglum, sum eru galdandi við líknandi umboðsval.

Umboð fyri kommunu verður valt av sitandi bý- ella bygdarráði eftir somu reglum, sum eru galdandi fyri líknandi umboðsval.

Umboð fyri starvsfólk skúlans verður valt á einum fundi fyri starvsfólkum. Fundurin skal skrivliga verða øllum starvsfólkum í minsta lagi 3 vikur fyri fundardagin. (Smb. stk. 2).

Umboð ráðsins verður valt av sitandi ráði eftir somu reglum sum eru galdandi við líknandi umboðsval. (Smb. stk. 3).

Ad. § 7. Stýrið virkar í samsvari við tær viðtøkur, sum eru galdandi fyri skúlan. Stýrið er tó undirlagt teimum heimildum, sum liggja hjá yrkisútbúgvingarráðnum og landsstýrismanninum.(Smb. stk. 1).

Við góðkendar yrkisútbúgvingar verður meint við útbúgvingar, sum landsstýrismaðurin, smb. § 5. stk. 1 í løgtingslóg um yrkisútbúgvingar, hevur sett á stovn. (Smb. stk. 2).

Ad. § 8. Stýrið kann tó ikki geva skúlastjóra heimildir, um ásett er í lóg ella kunngerð, at nevndu heimildir liggja hjá stýrinum ella yrkisútbúgvingarráðnum. (Smb. stk. 2).

Ad. § 9. Stýrisins evsta ábyrgd er staðfest her. Fyri stýrislimir galda vanligar, føroyskar reglur um endurgjaldsábyrgd. Men teir kunnu ikki ábyrgjast persónliga fyri skúlans fíggjarligu skuldbinding. (Smb. stk. 1). Hesi stykki geva landsstýrismanninum heimild til - í serstøkum føri - at seta eina tíðaravmarkaða fyribilsskipan í verk. (Smb. stk. 2-3).

Talan er ikki um eina herðing av vanligu ábyrgdini hjá stýrislimunum. (Smb. stk. 4).

Ad. § 10. Skúlastjórin er dagligur leiðari skúlans og er undir ábyrgd stýrisins.

Ad. § 11. Talan er um fastur útreiðslur, sum eru óheftar av næminga- ella flokkatali. (Smb. stk. 1).

Hesi skúlaheim eru knýtt at yrkisskúlunum (Smb. stk. 2).

Hesin stuðul er treytaður av, at landsstýrismaðurin hevur góðkent møguligar ný- og útbyggingaretlanir (Smb. stk. 3).

Að § 12. Eftir vanligum løgfrøðisligum reglum er tað landsstýrismaðurin, sum hevur prógvbyrðuna um, at ein stuðulstreyt ikki er hildin.

Að § 13. Hesin stuðul frá kommununum kann t.d. verða latin sum ókeypis grundøki undir bygningar, tá skúli verður bygdur ella útbygdur. (Smb. stk. 1).

Talan er um viðurskifti í rammulóg nr. 55 frá 14.12.1965 um býti av kommununnar parti av útreiðslunum, sum eru sett inn í yrkisskúlalógina. (Smb. stk. 2-3).

Að § 14. Talan er um stuðul, sum verður goldin til sjálva undirvísingina í yrkisskúlunum. Um ein partur av undirvísingarútreiðslunum verður fíggjaður av øðrum, verður frammanfyri nevndi stuðul minkaður tilsvarandi. (Smb. stk. 1).

Að § 15. "Arnað virksemi" skal hava eitt náttúrligt tilknýti til skúlans virki annars. (Smb. stk. 1). Her er hugsað um bæði privatar og almennar útbjóðarar. (Smb. stk. 2).

Að § 16. Slíkur stuðul kann verða neyðugur, tá ið skúli fer undir ávist royndurvirksemi. Stuðul til slíkar verkætlanir eigur, við støði í einari eftirmeting, at koma undirvísingarvirkseminum, skúlaverkinum sum heild og vinnuni til gagns.

Að § 17. Í løtuni er tað landsstýrismaðurin í fíggjarmálum, sum hevur samráðingarrættin við yrkisfeløgini.

Að § 18. Av fíggjarligum og praktiskum orsøkum er tað ynskiligt, at yrkisskúlarnir hava felags fyrisitingarliga skipan, herfímillum á roknskapar- og edv økinum.

Að § 19. Viðvíkjandi roknskaparviðurskiftum skulu sjálvsognarstovnar fylgja reglunum um almenna roknskaparhaldið. (Smb. stk. 1).

Løggildugur grannskoðari er felagsheitt fyri allar góðkendar grannskoðarar.(Smb. stk. 2).

Talan er um upplýsingar, sum landsgrannskoðanin skal nýta í sambandi við fíggjarløgtingslógina.(Smb. stk. 3).

Her hevur landsstýrismaðurin heimild at nyta § 9. stk. 2 og 3. (Smb. stk. 4).

Að § 20. Mannagongdin í kærumálum eftir hesi lóg fylgir teimum reglum, sum nýttar verða í undirvísingar- og útbúgvingarmálum annars.(Smb. stk. 1).

Að § 21. Miðað er ímóti, at lógin verður sett í gildi samstundis sum lógin um yrkisútbúgvingar verður sett í gildi.(Smb. stk. 1).

Viðtøkurnar fyri yrkisskúlarnar skulu gerast eftir gjøllari reglum, sum landsstýrismaðurin, smb. § 3. stk. 1, kann áseta. (Smb. stk. 3).

Hesi hava fingið eitt eintak av álitinum um yrkisskúlaskipan til umsagnar:

1) *Tekniski Skúlin í Havn*
2) *Lærarafelagið við Tekniska Skúlan í Havn*
3) *Havnar Handverksmeistarafelag*

4) *Havnar Handverkarafelag*
5) *Tórshavnar kommuna*
6) *Føroya Handverksmeistarafelag*
7) *Føroya Handverkarafelag*
8) *Tekniski Skúlin í Klaksvík*
9) *Lærarafelagið við Tekniska Skúla í Klaksvík*
10) *Klaksvíkar Handverksmeistarafelag*
11) *Klaksvíkar Handverkarafelag*
12) *Eysturoyar Handverksmeistarafelag*
13) *Skála Handverkarafelag*
14) *Fuglafjarðar Handverkarafelag*
15) *Nes Handverkarafelag*
16) *Kalksvíkar kommuna*
17) *Maskinmeistarafelagið*
18) *Fiskivinnuskúlin*
19) *Lærarafelagið við Fiskivinnuskúlan*
20) *Kristian á Neystamø, form. í skúlaráðnum í Fiskivinnuskúlanum*
21) *Leivur Harryson, landsgrannskoðari*
22) *Føroya Lærurað*
23) *Føroya handilsskúli*
24) *Lærarafelagið við Føroya Handilsskúla*
25) *Handilsskúlin á Kambsdali*
26) *Lærarafelagið við Handilsskúlan í Kambsdali*
27) *Føroya Keypmannafelag*
28) *Starvsmannafelagið*
29) *S&K-felagið*
30) *Fuglafjarðar kommuna*
31) *Vágoya Kommunufelag*
32) *Føroya Arbeiðsgevarafelag*

1. viðgerð hósdagin 12. mars 1998. Uppskotið verður beint í mentunarnevndina.

Málið fall burtur sbr. stýrisskipanarlógini § 15 stk. 3, tí at løgtingsval var 30. apríl 1998, og málið ikki var liðugt viðgjørt á tingi fyri valið.

F.L. j.nr. 2116-18/96

152 Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um skrásetingargjald á motorakførum v.m.

Ár 1998, hósdagin 5. mars, legði Anfinn Kallsberg, landsstýrismaður, vegna landsstýrið fram soljóðandi

Uppskot
til
løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um skrásetingargjald á motorakførum v.m.

§ 1.

Í løgtingslóg nr. 175 frá 18. desember 1992 um skrásetingargjald á motorakførum v.m. við seinni broytingum verða gjørdar hesar broytingar:

1) § 2, stk. 1 verður orðað soleiðis:
"Tað avgjaldsskyldugta virðið á einum akfari við allari vanligari útgerð, er tollskylduga virðið við innflutning til landið (CIF-virðið føroyska havn). Landstýrimaðurin í skattamálum kann við kunngerð áseta frádrátt, sum skal tokast av virðisgjaldi til landskassan við innflutning av nýggjum akfari, og áseta neyvari reglur í sambond við trygdarútgerð. Frádráttur fyri trygdarútgerð kann í mesta lagi verða krónur 10.000.".

2) § 2, stk. 2 verður orðað soleiðis:
"Stk. 2. Við innflutning av akfari skal gjaldast meirvirðisgjald av avgjaldsskylduga virðinum. Við sølu av innflutum akfari kann meirvirðisgjaldið ikki gerast minni enn meirvirðisgjaldið av avgjaldsskylduga virðinum.".

3) Í § 2, stk. 3 verður eftir "fevnir" sett: "um".

4) Í § 2, stk. 4 verður eftir "felagum" strikað: ",".

5) Í § 2 verður sum nýtt stk. sett:
"Stk. 5. Fyri innflutt akfør, ið hava verið á goymslu hjá bilasølu í meira enn eitt ár, verður virðisgjald av avgjaldsskylduga virðinum, at minkað 10% fyri hvørt byrjað ár, tó ongantíð meira enn 30%.".

6) § 3 verður orðað soleiðis:
"**§ 3.** Fyri persónvognar til og við krónur 65.000 í avgjaldsskyldugum virði er virðisgjaldið 80% av avgjaldsskylduga virðinum. Fyri persónvognar yvir krónur 65.000 í avgjaldsskyldugum virði, er virðisgjaldið 86% av avgjaldsskylduga virðinum.".

7) § 4, stk. 1 verður orðað soleiðis:
"Fyri hýru- og skúlavognar er virðisgjald ásett sambært § 3.".

8) § 4, stk. 3 verður orðað soleiðis:
"Stk. 3. Virðisgjald eftir stk. 1 verður eftir umstøðunum at afturrinda. Eftir hvørt árið verður afturrindað eitt gjald av 4 eins gjøldum, verður akfar tó eftir stk. 1 skrásett sum persónvognur áðrenn 4 ár (48 mánaðir), er virðisgjaldið til landskassan luttalsliga svarandi til tíðina, sum restar í teimum 48 mánaðunum. Rætturin til afturrindan av virðisgjaldi fellur burtur í teimum førum, at krav um afturrindan ikki verður sett innan 6 mánaðir aftaná hvørt heilt akfarsár frá tí degi at afturrindan kundi farið fram.".

9) § 4, stk. 4 verður orðað soleiðis:
"Stk. 4. Eftir hvørt árið skal skjalprógvast, at akfarið hevur verið nýtt sum hýru- ella skúlavognur. Miðalinntøkan skal minst vera krónur 4,75 fyri hvønn koyrdan kilometur hjá akfari, um aftanrindan annars kann fara fram. Inntøka verður at upplýsa fyri fartta akfarsárið og reglurliga førd koyribók verður at vísa myndugleikanum. Landsstýrismaðurin í skattamálum kann við kunngerð áseta reglur um koyrdar kilometrar, innkoyring, umskráseting, kravda nytslu av taksametur, o.a., sum skjalprógv fyri, at akfarið hevur verið nýtt sum hýru- ella skúla-vognur.".

10) § 5, stk. 1 verður orðað soleiðis:
"Fyri vøruvognar av skapi og merki sum persónvognar er virðisgjaldið 46% av avgjaldsskylduga virðinum.".

11) § 8 verður orðað soleiðis:
"**§ 8.** Fyri last- og vøruvognar, dumparar og leguvognar, er virðisgjaldið 17% av avgjaldsskylduga virðinum fyri akfør við totalvekt á 3.500 kg og undir. Fyri akfør eftir
1. punktum við totalvekt yvir 3.500 kg er einki virðisgjald.".

12) § 11 verður orðað soleiðis:
"**§ 11.** Fyri motorsúkklur við motorstødd á 50 cm3 og undir er virðisgjaldið 16% av avgjaldsskylduga virðinum. Fyri motorsúkklur við motorstødd yvir 50 cm3 er virðisgjaldið 160% av avgjaldskylduga virðinum.".

13) § 12 verður orðað soleiðis:
"**§ 12.** Fyri kampingvognar er virðisgjaldið 60% av avgjaldskylduga virðinum.".

14) § 15, stk. 1 verður orðað soleiðis:
"Fyri akfar, ið hevur verið endaliga skrásett í útlandi í minsta enn 1 ár, er virðisgjaldið 90% av einum tilsvarandi nýggjum akfari. Fyri tilsvarandi nýtt akfar verður tað avgjaldsskylduga virðið at leggja til grund.".

15) § 15, stk. 2 verður orðað soleiðis:
"Fyri akfar, ið hevur verið endaliga skrásett í útlandi úr 1 til 5 ár, er virðisgjaldið 70% av einum tilsvarandi nýggjum akfari. Fyri tilsvarandi nytt akfar verður tað avgjaldsskylduga virðið at leggja til grund.".

16) § 15, stk. 3 verður orðað soleiðis:
"Fyri akfar, ið hevur verið endaliga skrásett í útlandi í 5 ár ella longri, er virðisgjaldið 50% av einum tilsvarandi nýggjum akfari. Fyri tilsvarandi nytt akfar verður tað avgjaldsskylduga virðið at leggja til grund.".

17) § 18, stk. 3 verður orðað soleiðis:

"Skrásetingargjaldið kann ongantíð vera lægri enn 30% av virðisgjaldinum av einum tilsvarandi nýggjum akfari. Fyri tilsvarandi nytt akfar verður tað avgjaldsskylduga virðið at leggja til grund.".

§ 2

Henda løgtingslóg kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

§ 3

Við ígildissetan av lógini verða øll innflutt akfør, um tey ikki enn eru seld víðari, fevnd av nýggja háttinum at gera upp tað avgjaldsskylduga virðið. Øll avgjøld verða at gjalda samsvarandi gjørdu lógaráseting unum, um tey ikki longu eru goldin.

Viðmerkingar

Almennar viðmerkingar

Uppskot til lógarbroyting fevnir um uppgerð av avgjaldsskylduga virðinum við áseting av virðisgjaldi til landskassan og um nýggja skipan í samband við virðisgjald av hýru- og skúlavognum.

Viðvíkjandi tí avgjaldsskylduga virðinum, so fevnir núverandi skipan um eina áseting av virðisgjaldinum, sum í stóran mun verður ávirkað av skiftandi marknaðarvirðurskiftum fyri akfør. Virðisgjald er skiftandi við sølu av akfari eftir verandi skipan og hetta er ikki eitt støðugt inntøkugrundarlag hjá landskassanum, um dentur verður lagdur á grundarlagið fyri sølu á hvørjum einstakum akfari. Samstundis viðførir einstaka sølan av akfari sum heild, í eins stóran mun skiftandi inntøkugrundarlag hjá akfarsseljara, tá støðið verður tikið í givnum upplýsingum um skiftisavlop í samband við sølu av akfari.

Núverandi skipan, inniheldur eitt nú vanligan søluprís her í landinum, sum er útrokningargrundarlagið fyri avgjaldsskylduga virðinum. Er møguleiki fyri at gera eina flyting ella fakturering á ein hátt, soleiðis at hesi ikki eru fevnd av avgjaldsskylduga virðinum, hvílir avgjaldsskylduga virðið á leysum grundarlag. Tað hevur við verandi reglum ikki verið møguligt at forða fyri, at bugsað hevur verið í, at flyta ávísar partar av avgjalds-/prísgrundarlagnum frá avgjaldsskylduga til avgjaldsfrítt øki, til dømis í samband við keyp av brúkta bilinum hjá kundanum.

Uppskot er til nýggja skipan í samband við virðisgjald av hyru- og skúlavognum við skráseting. Verandi skipan inniber at einki virðisgjald verður goldið fyri hyru- og skúlavognar, fyrr enn hesir innanfyri eitt 4 ára tíðarskeið vera skrásettir sum persónvognar. Eitt lutfalsligt gjald verður tá ásett í mun til nær akfarið varð skrásett sum persónvognur og hetta skal inngjaldast til landskassan.

Núverandi skipanin fyri hýru- og skúlavognar virkar ikki nøktandi. Umsitingin hevur stórar trupulleikar við at fáa peningin inn, tá skráseting til persónvogn fer fram innanfyri 4 ára tíðarskeiðið. Ongi haldgóð minstukrøv eru stillað til tílík akfør, sum inniber, at talan í einstøkum føri ikki er um, at reka vinnu á vinnuligum grundarlag. Talan er um viðurskifti, ið ikki eru nøktandi á nakran hátt fyri landskassan og umsitingina. Tískil er tað neyðugt við lógarbroyting á hesum øki skjótast møguligt.

Við hesum uppskoti verður lagt upp til, at ommanfyri nevndu viðurskifti verða lættari at umsita, bæði tá talan er um at avrokna avgjald til landskassan og hvat viðvíkur hyru- og skúlavognum.

Øll gjøld til landskassan verða við støði í tollskylduga virðinum á akførum, "CIF-virðið føroyska havn". Mett verður, at fyri vinnuliga sølu av innfluttum akførum vera umstøður og treytir meira eins at virka undir í framtíðini. Hetta fevnir eisini um útrokningargrundarlagið fyri meirvirðisgjald í sambandi við innflutning av akfari. Í uppskotið, verður tó sett minstamark fyri meirvirðisgjaldi í sambandi við víðari sølu, ið er sett til somu upphædd sum meirvirðisgjald við innflutning.

Allir relativir satsir eru tillagaðir til nýggja og lægra útrokningargrundarlagið, hetta fyri at virðisgjaldið kann vera óbroytt í mun til verandi inntøkur hjá landskassanum. Mett verður at uppskotið inniber, at edv-skip-

ania innan umsitingina av hesum øki eigur at tillagast til nýggja útrokningargrundarlagið. Tískil kann staðfestast, at nýggja skipanin inniber, at tað eisini verður møguligt at gera tær neyðugu edv-tekniskU tilrættingarnar.

Mett verður ikki, at nakar fíggjarligur kostnaður stendst av hesum uppskoti í sambandi við virðisgjald av akførum.

Í sambandi við meirvirðisgjald, stendst ein fíggjarligur kostnaður av einari likviditetsniðurgongd, ið er grundað á, at minni skal svarast í mvg við innflutning av akførum. Meirvirðisgjald verður borið aftur við inngangandi mvg 'num í meirvirðisgjaldsskipanini, og tískil verður í hægsta lagi talan um rentuinntøkuna hjá landskassantm, við at hava tað meira í meirvirðisgjaldi til taks í eitt kvartal, áðrenn eitt møgulig afturrindan fer fram.

Í sambandi við meirvirðisgjald, verður minstamark sett fyri meirvirðisgjaldið til landskassan. Tað kann eftir nýggju skipanini ikki gjaldast minni meirvirðisgjald við viðari sølu, enn goldið varð við innflutning av akfari. Við at áseta eitt minstamark verður mett, at landskassin fær eina lítla meirinntøku, uttan at vísast kann á nakað ávíst krónutal.

Sum heild leggur uppskotið ikki upp til, at hækkingar í satsum skulu geva landskassanum stórvegis eykainntøkur.

Viðvíkjandi sølu av akførum verður mett, at sølan ikki kann halda á fram at vera á núverandi støði og tískil munandi fer at minka av sær sjálvum næstu árini, tá útskifting av gomlum akførum steðgar.

Serligar viðmerkingar

Ad 1. Broytingaruppskotið hevur til endamáls at dagføra viðurskifti í sambandi við útrokningargrundarlagið fyri skrásetingargjald til landskassan.

Avgjaldsskylduga virðið við innflutning er tollskylduga virðið. CIF-virðið føroyska havn. Hetta merkir, at virðisgjaldið fyri akfør við allari vanligari útgerð, verður at gjalda í mun til virðið við innflutning til eina føroyska havn. Virðisgjald verður at gjalda av hesum: fakturaprísi, flutningsútreiðslum, trygging, innskipan og handfaring til innflutningsstaðið. Víst verður eisini beinleiðis til løgtingslóg um toll, nr. 121 frá 23. desember 1991 við seinni broytingum, kap. 6, Tollvirðið.

Dentur verður lagdur á, at akfar hevur alla vanliga útgerð við innflutning til landið. Í tann mun, at akfar verður innflutt til landið uttan vanliga útgerð v.m., vegna at hendla er tikin burturúr akfarinum, møguliga fyri at umganga avgjald eftir hesari lóg, skal virðisgjald ikki svarast samhært vanligu meginreglu (CIF-virðið føroyska havn) eftir hesi lóg. Virðisgrundarlagið fyri eitt innflutt akfar verður tá ásett av tollvaldinum, vegna at akfarið ikki kemur til landið við allari vanligari útgerð. Er talan um trygdarútgerð, so fæst ongin frádráttur um útgerðin ikki er ísett við innflutning.

Tað kann ikki góðtakast, at akfør á nakran hátt verða skravatði fyri útgerð av einoghvørjum slag, uttan í mun til um hetta beinleiðis verður gjørt, fyri at sleppa undan at gjalda rætt virðisgjald við innflutning og síðani at íseta útgerð í akfar.

Virðisgjald til landskassan kann lækkað við einum í kunngerð ásettum frádrátti fyri trygdarútgerð, tó ongantíð við meira enn krónur 10.000. Frádráttur verður bert at lata nýggjum akførum, t.v.s. ikki tí akfør ið hava verið skrásett áður ella tí akfør, ið fáa ein ávísan ágóða av, at tey hava verið á goymslu hjá akfarssølu í yvir eitt ár. Landsstýrismaðurin í skattamálum hevur heimild til at áseta frádráttin, hvør trygdarútgerð er fevnd av rættinum til frádrátt og neyvari um trygdarútgerð.

Ad 2. Við hesari skipan verður skotið upp, at meirvirðisgjald á sama hátt sum virðisgjald, verður at roknað uv avgjaldsskylduga virðinum við innflutning av akfari.

Við víðari sølu verður, sum vanligt er á frium marknaði, at svara meirvirðisgjald í sambandi við sølu sambært meirvirðisgjaldslógini.

Við hesari skipan verður skotið upp, at meirvirðisgjald í samband við víðari sølu, ógarntið kann gerast minni enn meirvirðisgjaldið við innflutning av akfari.

Ad 5. Við hesari skipan verður skotið upp, at akfør, ið hava verið á goymslu hjá bilasølu, ikki skulu svara sama virðisgjald sum nytt akfar, men at virðisgjaldið verður at gera upp til avgjaldsskylduga virðið vil innflutning. Hetta inniber, at fyrst verður upprunaligt virðisgjald uppgjørt, síðani verður fyri eitt farið tíðarskeið loyvt, at upprunaligt virðisgjald kann lækkast við ti í lógini ásetta prosentpartinum.

Ad 6. Við hesari skipan verður skotið upp, at virðisgjaldið, tð skal gjaldast fyri persónvognar, verður at áseta við tveimum satsum, ið eru tillagaðir. Virðisgjald verður at gjalda í mun til avgjaldsskylduga virðið á akfari við innflutning.

Við lægri satsi verða persónvognarnir bíligari og mótsatt við hægri satsi, hetta í mun til, at verandi inntøkur hjá landskassanum eisini vera óbroyttar.

Dømi:				
Persónvognur, CIF-Tórshavn:		krónur 50.000		krónur 70.000
Virðisgjald:	80%	krónur 40.000	86%	krónur 60.200
Trygdarútgerð maks.:		krónur 10.000		krónur 10.000
Virðisgjald at gjalda:		krónur 30.000		krónur 50.200

Ad 7. Við hesari skipan verður skotið upp, at tað fyri hyru- og skúlavognar skal latast virðisgjald á sama hátt, sum galdandi er fyri vanligar persónvognar. Meiningin er síðani, at upphædd svarandi til virðisgjald verður at gjalda út, um ásettu treytirnar í lógini verða yvirhildnar.

Ad 8. Uppskotið inniber, at virðisgjald eftir umstøðunum verður at gjalda út við 4 eins gjøldum. Áftana hvørt akfarsár, verður eitt gjald at gjalda út, inntil øll 4 gjøld eru útgoldin. Eftir umstøðunum merkir í hesum høpi, at treytir fylgja við rættinum til at fáa útgjald og tær skulu verða uppfyltar áðrenn talan kann verða um útgjalding.

Verður ein hýru- ella skúlavognur umskrásettur áðrenn 4 ár eru gingin (48 mánaðir), verður virðisgjald, ið fellur til landskassan lutfalsliga ásett, svarandi til tíðina, sum restur í teimum 48 mánaðunum. (Avrundað verður niðureftir til heil tøl býtisfør við 100)

Dømi:	
Hýruvognur, CIF Tórshavn,	krónur 100.000
Virðisgjald 86%:	krónur 86.000
Yvirheldur treytir 1. árið:	krónur 21.500 kunnu útgjaldast
Síðani hendir umskráseting eftir _ ári:	krónur 10.750 útgj. eftir akfarsár
Virðisgjald (30/48) x 86.000 (avrundað)	krónur 53.700 í landskassan

Tað er ikki nóg mikið at ein hevur rætt til at fáa penING útgoldnan. Neyðugt er at seta fram krav um útgjald, hetta skal í seinasta lagi gerast innan 6 mánaðir aftaná hvørt akfarsár. Aftaná hetta er ikki møguligt, at eiga nakað krav uppá útgjald fyri eitt ávíst akfarsár.

Verður krav sett um útgjalding og eru viðurskifti ikki eftirkannaði enn, um treytirnar eru uppfyltar fyri at fáa pening útgoldnan, so verður neyðugt við nøktandi eftirkanning áðrenn ein útgjalding kann fara fram.

Ad 9. Uppskotið inniber, at dentur verður lagdur á nøktandi skjalprógv fyri, at akfarið hevur verið nýtt sum hýru- ella skúlavognur, sum meiningin var.

Eitt áfrávikiligt minstamark fyri inntøku, er krónur 4.75 fyri hvønn køyrdan kilometur hjá akfari, um afturtindan annars kann fara fram. Tað er sostatt ikki nóg mikið, einsamalt at uppfylla hetta kravið. Hartil skal minstamarkið ikki skiljast sum nøkur forðing fyrt, at krøviti til inntøku pr. køyrdan kilometur ikki kunnu økjast. Hetta kann vera gjørt við áseting í kunngerð, sambært heimildini hjá landsstýrismanninum í skattamálum.

Verður inntøkan pr. køyrdan kilometur lægri enn krónur 4,75, kann útgjald ikki játtast. Vísir tað seg, at inntøkan eitt seinni akfarsár er ájøvn ella langt yvir, so er tvíguleiki fyri at útgjalding av gjaldi fyri hetta ávísa ári kann fara fram, um treytir annars eru uppfyltar.

Inntøka verður at gera upp fyri farna akfarsár og verður at upplýsa fyri myndugleikanum, samstundis við, at ein dagførd køyribók verður at lata inn. Køyribókin eigur at vera útgreinandi førd og skal eisini vera regluliga førd yvir virksemi við hýru- ella skúlavognskøyring í farna akfarsárinum.

Landsstýrismaðurin í skattamálum kann við kunngerð áseta nærri reglur um viðurskifti viðvíkjandi hýru- og skúlavognum, um neyðugt verður við hetri skjalprógvi fyri, í hvønn mun eitt tílíkt akfar er í nýtslu sum hýru- ella skúlavognur. Heimildin fatar eisini um, at seta hægrt krøv um inntøku fyri køyrdar kilometrar, at áleggja nýtslu av taksametur og at krevja nágreiniligari skjalprógv fyri hesa vinnu.

Ad 10-17. Talan er sum heild um tillaging av satsunum til nýggja avgjaldsskyldugu virðið, ið hetta uppskotið leggur upp til.

1. viðgerð miðvikudagin 18. mars 1998. Uppskotið verður beint í fíggjarnevndina.

Málið fall burtur sbr. stýrisskipanarlógini § 15 stk. 3, tí at løgtingsvalið var 30. apríl 1998, og málið ikki var liðugt viðgjørt á tingi fyri valið.

F.L. j.nr. 2520-18/91

153 Uppskot til løgtingslóg um gjald av vinningi við burturluting v.m.

Ár 1998, hósdagin 5. mars, legði Anfinn Kallsberg, landsstýrismaður, vegna landsstýrið fram soljóðandi

Uppskot
til
løgtingslóg um gjald av vinningi við burturluting v.m.

I. Avgjaldsskylda og -grundarlag

§ 1. Vinningur av burturluting, eydnuspæli, happadrátt, vedding, premiulánsbrævi, premiukonto, gitikapping o. tl. har loyvi krevst frá føroyskum myndugleika ella sum haldast vera almennar, hóast loyvi ikki krevst, er undantikin inntøkuskatt til land og kommunu.

Stk. 2. Vinningur frá bókmentaligari, listaligari, vísindaligari og tekniskari kapping og virðisløn fyri tílíkt arbeiði er undantikin inntøkuskatt til land og kommunu.

Stk. 3. Í staðin fyri inntøkuskatt skal latast gjald, sum er 15% av tí parti av vinninginum, sum er omanfyri 3.000,00 kr. Gjaldið fellur til landskassan.

Stk. 4. Fellur vinningurin á ein lutaseðil sum er býttur í partar, verður avgjaldið roknað av hvørjum partlutaseðli sær.

Stk. 5. Tað hevur onga ávirkan á avgjaldsútrokningina, at fleiri persónar í felag spæla uppá sama lutaseðil (heilan seðil ella ein partlutaseðil) ella á annan hátt í felag vinna ein í hesi lóg umrøddu vinningum.

II. Uppgerð og rindan av avgjaldinum

§ 2. Tað áliggur honum, sum vegna felag hevur fingið loyvi til burturluting v.m., ella hann loyvi ikki krevst, honum sum skipar fyri, at gjaldið eftir §1, stk. 3 verður rindað landskassanum.

§ 3. Avgjøld av vinningum eftir løgtingslóg um ítróttarvedding, føroyskan happadrátt, kringvarp og happadráttarloyvi til Útvarp Føroya skulu fráboðast og rindast landskassanum eftir reglum ásettar av landsstýrismanninum í skattamálum.

§ 4. Í øðrum førum skal loyvishavarin í seinasta lagi ein mánaða aftaná burturlutingina v.m. luta Toll- og Skattstovu Føroya uppgerð, sum greitt synir avgjaldsgrundarlagið.

Stk. 2. Roknaða avgjaldið skal rindast samstundis, sum uppgerð verður latin Toll- og Skattstovu Føroya.

Stk. 3. Landsstýrismaðurin í skattamálum kann gera nærri reglur fyri slíkum uppgerðum.

Stk. 4. Verður uppgerðin ikki latin inn rættstundis, kann avgjaldið verða hækkað.

Hækkingin kann í mesta lagi verða 50% av roknaða avgjaldinum.

§ 5. Har vinningur ikki er í reiðum peningi verður virðið roknað eftir handilsvirði við sølu til brúkara.

III. Vinningar uttanlands

§ 6. Vinningur av burturluting v.m. uttan fyri Føroyar til persón livandi av §1 í løgtingslóg um landsskatt og kommunuskatt er undantikin inntøkuskatt til land og kommunu, um vinnarin rindar gjald til landskassan eftir reglunum í hesi lóg. Vinnarin skal skrivliga boða Toll- og Skattstovu Føroya frá innan 14 dagar aftaná, at vinningurin er goldin vinnar anum.

§ 7. Avgjald, sum er goldið aðrastaðni enn í Føroyum av vinningi haðani, kann verða dripið frá í tí gjaldi, sum latast skal eftir hesi lóg. Frádripið kann tó ikki verða meira enn tað avgjald, sum annars skuldi verið rindað landskassanum eftir hesi lóg.

IV. Eftirlit og inukrevjing

§ 8. Toll- og Skattstova Føroya umsitur og innkrevur avgjøld eftir hesi lóg.

Stk. 2. Toll- og Skattstovu Føroya kann krevja, at loyvisbavarin leggur fram tey skjøl, sum eru grundarlag fyri roknskapinum.

Stk. 3. Somuleiðis kann Toll- og Skattstova Føroya koma á staðið at skoða vinningartar.

§ 9. Føroya Gjaldstova kann eftir áheitan frá Toll- og Skattstovu Føroya við pantingi innheinta avgjald, ið ikki er goldið rættstundis.

V. Revsireglur

§ 10. Við bót verður hann revsaður, sum við vilja ella av grovum ósketni:

1) gevur skeivar ella villleiðandi upplýsingar ella heldur aftur upplýsingar til nytslu fyri útroktingini av avgjaldi eftir hesi lóg.
2) ikki letur inn uppgerð so sum fyriskrivað er í § 4. stk.1.
3) ikki avroknar avgjald til landskassan eftir § 3 og § 4. stk. 2.

§ 11. Toll- og Skattstova Føroya kann boða loyvishavaranum frá, at málið kann verða loyst uttan rættarviðgerð, um so er, at hann viðgongur seg sekan í lógarbrotinum og váttar, at hann innan nærri ásetta freist, sum eftir áheitan kann verða longd, vil gjalda eina í fráboðanini tilskilaða bót.

VI. Gildiskomu- og skiftisreglur

§ 12. Henda løgtingslóg fær gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd. Samstundis fer løgtingslóg nr. 11 frá 9. apríl 1968 um gjald av vinningi við burturluting v.m.úr gildi.

Stk. 2. Avgjald av vinningi av spæli í Føroyum aftaná 1. januar 1997, har loyvi er givið við heimild í løgtingslóg um ítróttarvedding, verður roknað eftir reglunum í hesi lóg.

Stk. 3. Fyri føroyska happadráttin koma reglurnar í hesi lóg í gildi 1. januar 1999. Fram til 1. januar 1999 verður avgjald latið eftir § 1, litra e í løgtingslóg um Føroyskan Happadrátt.

Almennar viðmerkingar

Síðani P/F Ítróttarvedding tók upp samstarv við Dansk Tipstjeneste er komið fram, at lóggávan um skatting av vinningum er heldur fløkjaslig. Óvissa hevur verið um, hvørt talan er um skattskyldu ella avgjaldsskyldu og um støddina av avgjaldinum.

Í verandi lóggávu er høvuðsreglan, at vinningar eru skattskyldug inntøka. Undantikið frá høvuðsregluni í skattalógini eru vinningar, sum rinda avgjald eftir burturlutingarlógini, vinningar frá Føroyska Happadráttinum og føroysk og donsk pretniulánsbrøv. Harumframt er í lógini um Ítróttarvedding ásett, at vinningarnir eru undantiknir inntøkuskatt til land og kommunu, hóast skattalógin ikki nevnir slíkar vinningar.

Ein arbeiðsbólkur varð settur við tí endamáli at fáa greiðari reglur á økinum.

Við hesum uppskotið verður høvuðsreglan um, at vinningar eru skattskyldug inntøka varðveitt, meðan bert teir vinningar, sum avgjald skal latast av eftir burturlutingarlógini, verða undantiknir inntøkuskatt til land og kommunu.

Ætlanin er, at vinningar av øllum lógligum spølum í Føroyum skulu lata sama avgjald til landskassan eftir hesi lóg. Allir vinningar verða javnsettir. Munur verður ikki gjørdur á, um vinningurin stavar frá ein hvørjari burturluting ella ein hvørjari listarligari kapping.

Í mun til verandi lóggávu hevur hetta við sær, at vinningar, sum stava frá listarligari kappingum o.t., sum í dag ikki lata nakað avgjald og heldur ikki teljast við í skattskyldugu inntøkuna, skulu rindað sama avgjald, sum aðrir vinningar. Hetta átti alt annað líkað viðført eina stórri avgjaldsupphædd til landskassan, men ikki ber til at siga hvussu mikið, tá hesir vinningar ikki hava latið avgjald áður.

Í mun til happadráttin fer eisini ein broyting fram. Avgjaldið, sum í dag er 10%, verður sett upp til 15%, meðan botnmarkið verður á kr. 3.000, áðrenn avgjald verður roknað av vinningi. Hetta ger, at smærri vinningar sleppa undan at rinda avgjald. Henda broyting verður mett at minka um avgjaldsupphæddina til landskassan við 150 tús. kr.

Henda skipanin hevur við sær, at neyðugt er at gera broytingar í løgtingslóg um Føroyskan Happadrátt, Ítróttarvedding og Eydnuspæl. Samstundis var neyðugt at gera so mikið umfatandi broytingar í burturlutingarlógini, at fregast var at gera eina nýggja burturlutingarlóg.

Viðmerkingar til tær einstøku greinirnar

Til § 1. Uppremsingin er ikki ætlað at verða úttømandi. Møgulig komandi spøl skulu eisini verða umfatað av burturlutingalógini.

Til stk. 3. Higartil hava vinningar undir kr. 3.000 verið avgjaldsfrír, meðan vinningar omanfyri hava rindað 15% í avgjaldi av fullari upphædd. Við hesi lóg verður avgjald bert latið av tí partinum av vinninginum, sum er omanfyri kr. 3.000.

Til stk. 4. Fyri tey spøl, t.d. happadrátturin, har seðlarnir verða givnir út og seldir í hálvum og minni pørtum, verður botnmarkið uppá kr. 3.000 galdandi fyri hvønn partlutaseðil sær.

Til stk. 5. Í øðrum førum er bert ein botnfrádráttur, hóast fleiri hava keypt ein seðil í felag.

Til § 2. Her verður gjørt greitt, at tað ikki er vinnarin, sum hevur ábygdina av, at avgjaldið verður rindað landskassanum, men at tað er loyvishavarin ella hann sum skipar fyri teknisku kappingum, sum skal halda aftur avgjaldinum og syrgja fyri, at avgjaldið verður latið landskassanum.

Til § 3. Ætlanin er, at avrokningin av avgjøldunum frá teimum stóru spølunum, skal verða fyriskipað fyri seg.

Til § 4. Fyri aðrar vinningar enn teir, sum koma undir § 3, skal uppgerð latast Toll- og Skattstovu Føroya. Uppgerðin er grundarlagið fyri útrokningini av avgjaldinum.

Til § 6. Um ein borgari, sum er undir fullari skattskyldu til Føroya, vinnur í útlendskum spæli, er ætlanin, at vinnarin, við at rinda avgjald til landskassan eftir hesi lóg, ikki skal telja vinningin við í skattskyldugu inntøkuna. Boðast skal Toll- og Skattstovu Føroya frá innan 14 dagar aftaná, at vinningurin er goldin vinnaranum. Um vinnarin ikki boðar frá, er vinningurin skattskyldug inntøka.

Til § 7. Í teimum førum har ein borgari vinnur í útlendskum spæli og longu hevur goldið avgjald í tí landi, har spælið er farið fram, skal vinnarin ikki rinda avgjald einaferð afturat. Tó so, at um tað goldna avgjaldið er minni enn 15%, skal munurin rindast landskassanum. Henda áseting fevnir t.d. um spølini hjá Dansk Tipstjeneste í Føroyum.

Til §§ 8 og 9. Higartil hevur Føroya Gjaldsstovu havt umsitingina av avgjaldinum um hendi. Við hesum verður umsiting og eftirlit lagt til Toll- og Skattstovu Føroya. Orsøkin er, at neyvt samband er millum skatting og avgjald av vinningum. Harafturat hevur Toll- og Skattstova Føroya longu eina fyrisiting, sum er uppbygd til at hava eftirlit við skattalógini og avgjaldslógum.

Til §§10 og 11. Her verður ásett hvørja avleiðing brot á lógina hevur.

Til §§ 12. Við hesum verður gjørt greitt, at vinningar frá Dansk Tipstjeneste aftaná 1. januar 1997 ikki eru skattskyldug inntøka, men skulu lata eitt avgjald uppá 15 % til landskassan.

Fyri at happadrátturin skal fáa høvi til at laga seg til broytingarnar, fáa reglarnar í hesi lóg ikki gildi fyri Føroyska Happadráttin fyrr enn 1. januar 1999.

1. viðgerð mánadagin 16. mars 1998. Uppskotið varð heinvíst í figgjarnevndina.

Málið fall burtur sbr. stýrisskipanarlógini § 15 stk. 3, tí at løgtingsvalið var 30. apríl 1998, og málið ikki var lidugt viðgjørt á tingi fyri valið.

F.L. j.nr. 2540-57/98

154 Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um eydnuspæl v.m.

Ár 1998, hósdagin 5. mars, legði Eilif Samuelsen, landsstýrismaður, vegna Edmund Joensen, løgmann, vegna landsstýrið fram soljóðandi

Uppskot
til
løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um eydnuspæl v.m.

§ 1.

Í løgtingslóg nr. 53 frá 7. mei 1987 við seinni broytingum verða gjørdar hesar broytingar:

1. Í § 6, stk. 1 verður orðingin "2 mánaðir" broytt til: "1 mánað".
2. Í § 6, stk. 3 verður orðið "gjaldstovuni" broytt til: "Toll- og Skattstovu Føroya".
3. Sum nýggj § 7A verður sett:

"**§ 7A.** Landsstýrismaðurin kann áseta ómaksgjald fyri veiting av loyvi til eydnuspæl v.m.".

§2.

Hetda lóg fær gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

Viðmerkingar

Skotnar verða upp nakrar tekniskt fyrisitingarligar broytingar, eisini sum fylgja av samstundis framlagda uppskotinum um nýggja burturlutingarlóg.

Viðvíkjandi fíggjarligu avleiðingunum av uppskotinum verður vist til viðmerkingarnar til uppskotið um burturlutingarlóg.

Til § 1, nr. 1. Freistin fyri at senda inn roknskap ella uppgerð verður broytt til 1 mánað, so samsvar er við reglurnar í uppskotinum til løgtingslóg um gjald av vinningi við burturluting v.m.

Til § 1, nr. 2. Umsiting og eftirlit við loyvum og avgjøldum verður flutt til Toll- og Skattstovu Føroya, so samsvar er við reglurnar í uppskotinum til løgtingslóg um gjald av vinningi við burturluting v.m.

Til § 1, nr. 3. Við hesum kann eitt ómaksgjald verða ásett fyri veiting av loyvi til eydnuspæl v.m., sum nøkulonda nøktar kostnaðin av umsitingini av loyvunum.

Í viðgerð mánadagin 16. mars 1998. Uppskotið vard beint í rættarnevndina.

Málið fall burtur sbr. stýrisskipanarlógini § 15 stk. 3, tí at løgtingsvalið var 30. apríl 1998, og málið ikki var liðugt viðgjørt á tingi fyri valið.

Fl.-jnr. 660-7/91

155 Uppskot til løgtingslóg um Føroya Realkreditstovn (Realin)

Ár 1998, hósdagin 5. mars, legði Anfinn Kallsberg, landsstýrismaður, vegna landsstýrið fram soljóðandi

Uppskot
til
løgtingslóg um Føroya Realkreditstovn (Realin)

Kapittul 1
Endamál stovnsins

§ 1. Føroya Realkreditstovnur, ið varð stovnaður við lóg nr. 60 frá 12. mars 1955, heldur fram sum sjálvsognarstovnur við navni Føroya Realkreditstovnur (Realurin). Endamál stovnsins er at veita lán við veð í fiskiførum, flótandi eindum og førum í frálandsvinnu og fiskaaling við heimstaði í Føroyum.

Stk. 2. Útlánsvirksemi kann, eftir avgerð landsstýrismansins í búskaparmálum, verða víðkað til aðrar vinnugreinir í Føroyum.

Stk. 3. Stovnurin heldur fram við teimum rættindum og skyldum, eginogn og avsetingar íroknaðar, ið eru bygd upp og stovnað av Færøernes Realkreditinstitut í rakstrinum samsvarandi lóg nr. 60 frá 12. mars 1955, grundfæ íroknað.

Kapittul 2
Leiðsla stovnsins

§ 2. Stovnurin verður stjórnaður av einari trínannastjórn, ið verður tilnevnd av landsstýrismanninum í búskaparmálum. Tilnevningin er fyri 5 ár í senn. Gjøllari reglur verða ásettar í viðtøkunum. Stjórnin ábyrgist mótvegis landsstýrismanninum í búskaparmálum fyri leiðslini av stovninum.
Stk. 2. Stjórnin setir starvsfólk, herundir møguligan undirstjóra, og metingarmenn. Landsstýrismaðurin í búskaparmálum skal kunnast um útnevning av undirstjóra og metingarmonnum.

§ 3. Sett verður ráðgevandi umboðsnevnd, ið hevur 10 limir, 2 valdir av løgtinginum, 2 av fólkatinginum, 2 av skuldarum stovnsins, 2 av Føroya Reiðarafelag, meðan Føroya Fiskimannafelag, Føroya Skipara- og Navigatørfelag og Maskinmeistarafelagið eru saman um at velja 2 limir, smb. tó § 18, stk. 3.
Stk. 2. Valini eru galdandi fyri 4 ár í senn. Stjórnin boðar umboðsnevndini til fundar í minsta lagi eina ferð um árið.

§ 4. Landsstýrismaðurin í búskaparmálum ger eftir tilmæli frá stjórnini viðtøkur fyri stovnin.

§ 5. Stjórar, undirstjórar og metingarmenn mega ikki taka lut í viðgerð av málum um lán til ella meting av ognum hjá teim sjálvum, hjúnafelagum teirra ella persónum, sum teir eru skyldir við í beinari linju ella fyrru og aðru síðulinju ella sum standa teimum serliga nær á einhvønn hátt.
Eftirheldur mega teir taka lut í viðgerð av málum um lán viðvíkjandi ognum, ið teir sjálvir hava veðrætt í ella keypsrætt til, ið teir seinastu tvey árini hava medvirkað til keyp ella umbygging av, ella ið teir sum fíggjarleiðarar ella medhjálparar medvirka ella í sama tíðarskeiði hava medvirkað til veðseting ella sølu av.
Stk. 2. Í fyrum, har stjórnin ikki er viðtøkufør orsakað av reglunum frammanfyri, tekur landsstýrið avgerð um lánveiting.
Stk. 3. Persónarnir, nevndir í stk. 1, og starvsfólk stovnsins mega ikki fyri egna rokning reka ella taka lut í spekulatiónshandlum.
Stk. 4. Eingin stjórnarlimur ella grannskoðari hjá grunninum kann taka lán frá grunninum, uttan góðkenning landsstýrismansins í búskaparmálum í hvørjum føri sær.

Kapittul 3
Ogn og lántøka

§ 6. Ognir stovnsins eru tað í § 1, stk. 3 nevnda grundfæ og ein tiltaksgrunnur, hvørs peningur verður útvegaður samsvarandi reglunum í § 8, stk. 9 og 10 og § 10, stk. 1.
Stk. 2. Tiltaksgrunnurin skal í minsta lagi vera 10% av samlaðu útlánum stovnsins og 20% av stovnsins skuld.
Stk. 3. Peningur í tiltaksgrunninum kann ikki verða lagdur út, men skal vera bundin eftir somu reglum, ið galdandi eru fyri peningaognir ómyndinga.
Stk. 4. Fer tiltaksgrunnurin við roknskaparárslok upp um mørkini sett í stk. 2, kann avlopsupphæddin tó eftir avgerð stjórnarinnar verða flutt til stovnsins grundfæ.

§ 7. Umframt grundfæið kann stovnurin útvega sær útlánspening við útgávu av skuldarbrøvum ella handhavaralánsbrøvum ljóðandi uppá stovnin sum svarandi reglunum í viðtøkum stovnsins.
Stk. 2. Undirskrift krevst frá øllum stjórnarlimunum skal samtykt eftir stk. 1 hava gildi.
Stk. 3. Áljóðandi upphæddin tilsamans av teimum útgivnu lánsbrøvum í umfari til hvørja tíð og øðrum skuldarbrøvum má ikki fara upp um fimmfalda grundfæið við seinasta roknskaparárslok.
Stk. 4. Landsstýrismaðurin í búskaparmálum kann, um serlig viðurskifti skulutu tala fyri tí, eftir tilmæli frá stjórnini loyva, at áljóðandi av lánsbrøvunum og skuldarbrøvunum kann vera sjeyfalda grundfæið.
Stk. 5. Gjøllari reglur um útrokning av lutfallinum millum grundfæ og tikin lán verða ásettar í viðtøkunum.

Kapittul 4
Útlán stovnsins

§ 8. Lánsupphæddir, renta, afturgjaldingartíð og aðrar treytir verða ásettar av stjórnini samsvarandi teimum reglum, ið ásettar eru í viðtøkunum.
Stk. 2. Stovnurin kann veita lán við 1. og 2. veðrætti. Lán við 1. veðrætti kunnu ikki fara upp um 60% av metingarvirðinum, tá lán við 2. veðrætti ikki verður veitt. Verður lán veitt við 2. veðrætti, er markið fyri 1. veðrættarláni 50%.
Stk. 3. Lán við 2. veðrætti kunnu verða veitt innan peningakarm svarandi til 30% av eginpeningginum, gjørdur upp sum grundfæ og tiltaksgrunnur. Tey kunnu einans verða veitt saman við 1. veðrættarlánum og kunnu ikki fara upp um 70% av metingarvirðinum. Lán kann tó veitast upp til 80% av metingar-

virðinum, verður lánið veitt við javnsettum veði frá aðrari fíggingarkeldu.
Stk. 4. Aflurgjaldstíðin av lánunum kann ikki vera longri enn 15 ár. Stjórnin kann tó í afturgjaldingartíðini, um serligar umstøður tala fyri tí, loyva at avdráttir verða lækkaðir ella at gjaldfreist verður veitt, soleiðis at afturgjaldingartíðin verður longd til í mesta lagi 20 ár.
Stk. 5. Hvið kann verða upp um tey í stk. 2 og 3 nevndu lánihámark, tá veðsettar ognir, ið eru yvirtiknar á tvingsilssølu ella undir líknandi umstøðum, verða seldar aftur, um sleppast kann undan óneyðugum fíggjarmissi á hendan hátt.
Stk. 6. Stovnurin kann ikki veita lán til ein lántakara ella ein bólk av sínámillum sambundnum lántakarum, ið fara upp um 25% av stovnsins ognum (grundfæ og tiltaksgrunni).
Stk. 7. Til játtan av láni krevst undirskrift av í minsta lagi tveimum stjórnarlimum, smb. tó § 5, stk. 2.
Stk. 8. Lánini verða útgoldin kontant við kursi og rentu, ið stjórnin ásetir.
Stk. 9. Hvørja ferð lán verður líkið, verður innskot goldið í tiltaksgrunnin sum gjøllari ásett í viðtøkunum. Innskotið verður afturgoldið, tá lánið er fult afturgoldið.
Stk. 10. Gjøllari reglur verða ásettar í viðtøkunum um rindan av innskoti, rindan av gjøldum til tiltaksgrunnin í afturgjaldingartíðini og avmarkingar av rættinum at fáa innskot afturgoldin tá lánið er fult afturgoldið.

§ 9. Lán verða bert veitt við trygd í teimum í § 1 nevndu ognum. Veðsetingin fevnir um ognina við tilhoyri sambært skipaskrásetingar- og tinglýsingarlógini og somuleiðis tryggingaruppheddina fyri tá veðsettu ognina.
Stk. 2. Gjøllari veðsetingarreytirnar verða ásettar av stjórnini og eru tilskilaðar í veðbrævatreytunum.

§ 10. Lántakararnir ábyrgjast við veðsettu ognunum við samábyrgd (sotidariskt) fyri skyldum stovnsins, hvør teirra við eintari upphædd, ið svarar til lánshøvuðsstólin. At veita fulnað fyri hesi ábyrgd kann stjórnin gera av, at kravt skal verða eykagjald til tiltaksgrunnin.
Stk. 2. Gjøllari reglur verða ásettar í viðtøkunum um avmarking og uppathald av samábyrgdini.

§ 11. Lántakararnir eru bundnir av teimum til hvørja tíð galdandi viðtøkum.

§ 12. Tey skjøl, ið verða givin út av stovninum ella til stovnin í sambandi við hansara virksemi, verða skráseti og tinglýst uttan gjald.
Stk. 2. Váttanir og útskriftir frá almennum myndugleikum at bráka við skráseting og tinglýsing av skjølum nevnd í stk. 1, verða latin uttan kostnað.

Kapittul 5
Eftirlit, roknskapur og grannskoðan

§ 13. Landsstýrismaðurin í búskaparmálum hevur eftirlit við stovninum. At útinna uttanhýsis eftirlitsstarvið tilnevnir landsstýrismaðurin í búskaparmálum ein grannskoðara. Stovnurin skal, tá tað verður kravt, lata grannskoðaranum allar upplýsingar um stovnsins viðurskifti. Landsstýrismaðurin í búskaparmálum ger reglugerð fyri uttanhýsiseftirlitið.

§ 14. Stovnurin ger fyri hvørjum roknskaparári ársroknskap við uppgerð av úrsliti, javna, viðmerkingum og ársfrágreiðing. Ársroknskapurin skal sýna rættvísandi mynd av ogn og skuld stovnsins, fíggjarligu støðuni og úrslitinum. Ársroknskapurin skal verða gjørdur samsvarandi góðum roknskaparsiði.
Stk. 2. Gjøllari reglur um ársroknskapin verða ásettar í viðtøkunum.

§ 15. Ársroknskapurin verður grannskoðaður av einum ríkisgóðkendum grannskoðara, valdum av stjórnini. Grannskoðanarbók verður førd fyri starv grannskoðarans.
Stk. 2. Gjøllari reglur um grannskoðanina verða ásettar í viðtøkunum.

§ 16. Grannskoðaði ársroknskapurin við undirskriftum og góðkenning stjórnarinnar verður lagdur fyri umboðsnevndina til umrøðis og síðan sendur landsstýrismanninum í búskaparmálum saman við viðmerkingum grannskoðarans í seinasta lagi 4 mánaðir eftir roknskaparárslok.
Stk. 2. Í seinasta lagi 1 mánað eftir hvørt fjórðingsárslok sendir stjórnin landsstýrismanninum skaparmálum úrtak av roknskapum stovnsins.

Kapittul 6
Avtøka stovnsins

§ 17. Verður stovnurin avtikin, leggur landsstýrismaðurin í búskaparmálum uppskot fyri løgtingið um, hvat ognir grunsins skulu brúkast til.

Kapittul 7
Gildiskoma og skiftisreglur

§ 18. Lógin kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd. Samstundis fer lóg nr. 60 frá 12. mars 1955 um Færøernes Realkreditinstitut úr gildi.

Stk. 2. Verandi stjórn verður sitandi tilnevningarskeiðið.

Almennar viðmerkingar

Landsstýrið hevur áður tvær ferðir lagt fyri tingið uppskot um at yvirtaka realkreditstovnin. Hetta er gjørt við løgtingsmálunum nr. 21/1989 og nr. 128/1992, men báðu ferðirnar fullu málini burtur.

Uppskotini vóru sett fram eftir áheitan frá forsætismálaráðnum. Síðani nevndu mál fullu burtur, hevur forsætismálaráðið við jøvnum millumbilum sent landstýrinum somu áheitan.

Tí hevur landsstýrið samtykt at leggja fyri tingið lógaruppskot um at "Færøernes Realkreditinstitut" gerst føroyskur burturav.

Landsstýrið hevur valt at gera minst møguligar broytingar í mun til verandi lóg. Men tá havt verður í huga, at stórt sæð ongar broytingar eru gjørdar í donsku fólkatingslógini, sum er lóg nr. 60 frá 12. mars 1955, verður neyðugt við ávísum ábøtum.

Nakrar broytingar eru tó, og tær mest týðandi eru hesar:

Stovnurin fær møguleika at víðka sítt útlánsvirksemi frá áður bert at kunna veita lán til fiskiskip, nú eisini til flótandi eindir og før í frálandsvinnu og fiskaaling og lánihámarkið hevur verið 50% av metingarvirðinum. Lánstíðin 10 ár við møguleika undir serligum umstøðum at leingja til 15 ár.

Landsstýrið skjýtur upp, at møguleikar vera bæði við einum 1. og 2. veðrætti. At lánihámarkið fyri 1. veðrætt verður hækkað til 60% av metingarvirðinum, um bert verður veitt 1. veðrættarlán. Hámarkið fyri 2. veðrætti verður 70% av metingarvirðinum, men 80% um lánt verður við síðustillaðum 2. veðrætti saman við láni frá øðrum lánstovni.

Lánstíðin verður upp til 15 ár við møguleika fyri umlegging undir serligum umstøðum til 20 ár.

Vantandi møguleikar fyri at útvega fígging svarandi til 2. veðrætt frá útlendskum lánstovnum og avmarkaðu møguleikarnir hjá øðrum føroyskum fíggingarstovnum, hava minkað møguleikarnar hjá realkreditstovninum at medvirka til eina rímuliga fígging í neyðugu endurnýggingini av fiskiflotanum.

Realkreditstovnurin hevur boðað landsstýrinum frá, at umboðsráðið fleiri ferðir seinastu árini hevur heitt á stjórnina hjá stovninum um at medvirka til, at møguleikar verða skaptir fyri einum heilt nýggjum 2. veðrættarstovni ella at stovnurin avsetur ein part av eginognini til útlán frá eini serligari 2. veðrættardeild.

Ein kanning av møguleikunum fyri at gera ein nýggjan stovn við luttøku av øðrum føroyskum fíggjarstovnum hevur víst, at undirtøka ikki var fyri hesum. Stjórnin í realkreditstovninum mælir tí landsstýrinum til, at møguleikar vera skaptir í nýggja lógarkarminum fyri øktum lánivirksemi, soleiðis at tann passiva eginognin kemur føroyskari vinnu til góðar.

Heimildir og skyldur hjá forsætismálaráðnum, tjóðbankanum og fólkatinginum verða strikaðar og í staðin lagdar landsstýrinum til.

Orðið "fartøjer" verður broytt til "ognir" orsakað av víðkaðu heimildini í § 1.

Danski staturin hevur veitt trygd í samband við útgávu av lánsbrøvum, og ætlandi verður henda trygd varð

veitt fyri verandi lánsbrøv hóast yvirtøkuna. Landsstýrið noknar ikki við, at trupulleikar standast av hesum. Eftir § 4 ger landsstýrið viðtøkur fyri stovnin, og uppskot til viðtøkur vera lagdar við sum skjal.

Ymiskar ásetingar, sum áður hava verið í lógini, eru fluttar til viðtøkurnar og ovugt, soleiðis sum hildið verður hóskiligt.

Verandi lóg og viðtøkur vera eisini løgd við sum skjal.

Mett verður ikki, at lógin fær fíggjarligar avleiðingar fyri landskassan.

Viðmerkingar til tær einstøku lógargreinirnar

Ad. § 1. Smb. verandi lóg, sum er frá 12. mars 1955, er bert heimild at veita lán til fiskiskip. Hetta er ongantíð síðani broytt. Nú eitt føroysk frálandavinna stendur fyri framman, heldur landsstýrið, at Realurin eisini eigur at hava møguleika at fíggja føroysk før, sum fara uppí frálandavinnu og annars flótandi eindir, sum hava samband við hesa vinnu. Eisini eigur at vera møguleiki fyri at fíggja bátar/skip og aðrar flótandi eindir innan alivinnuna.

Skal Realurin fara inn í aðrar vinnugreinir, skal landsstýrið geva sítt samtykki.

Ad. 2. Eftir uppskotinum verður framvegis ein stjórn við 3 limum, sum landsstýrismaðurin í búskaparmálum tilnevnir. Eftir verandi lóg vóru teir tilnevndir av ávikavist forsætismálaráðnum, landsstýrinum og tjóðbankanum.

Førleikakrøvini til stjóranar skulu vera kunnleiki til búskap, fíggjarvirksemi, skipstøkni og -rakstur umframt/ella kunnleiki ella royndir í vinnuviðurskiftum annars.

Hvør einstakur stjóri nýtist ikki at hava allar hesar egnleikar, men teir tríggir stjórarnir skulu tilsamans hava hendan førleika.
Eftir verandi reglum eru metingarmenn settir í og loysir úr starvi av forsætismálaráðnum og landsstýrinum eftir tilmæli frá stjórnini í realinum (§ 4. stk.2 í verandi viðtøkum.)

Skotið verður nú upp, at tað er stjórnin einsamøll, sum setir í og loysir starvsfólk úr starvi eisini metingarmenn, tí hetta hóskar betur til nútíðar leiðslustýring.

Ad. § 3. Í galdandi reglum hava 10 limir mannað umboðsráðið og heldur benda skipan fram.

Ad. § 4. Landsstýrismaðurin í húskaparmálum ger viðtøkur fyri stovnin eftir tilmæli frá stjórnini. Uppskot til viðtøkur er gjørt og verður lagt við sum skjal.

Ad. § 5. Her er stórt sæð eingin broyting í mun til verandi § 7. (Verandi § 8 dettur burtur, tí hendan onga meining hevur longur.)

Ad. § 6. Egnognin hjá realinum er eitt grundfæ og tiltaksgrunnur, sum verður útvegaður eftir reglum, sum eru ásettar í viðtøkunum. Tiltaksgrunnurin skal onguntíð vera minni enn 10% av samlaðu útlánunum og 20% av stovnsins skuld.

Ad. § 7. Orðingin er stórt sæð tann sama sum verandi § 10.

Ad. § 8. Víst verður til almennu viðmerkingarnar.

Her er ein rættuliga stór broyting í mun til verandi reglur. Áramálið fyri lán eftir teim hjástandi galdandi

reglunum hevur verið í mesta lagi 10 ár sum meginregla, sum í undantaksføri kundi leingjast til 15 ár. Lánihámarkið er 50% av metingarvirðinum.

Skotið verður upp, at veitast kann bæði 1. og 2. veðrættur, tó soleiðis at Realurin bert veitir 2. veðrætt. um eisini verður veitt lán við 1. veðrætti.

Lán til 2. veðrætt verður avmarkað til 30% av eginognini og kann onguntíð fara uppum hetta mark. Aðrantáta skal útlánsvirksemi til 2. veðrætt stoðga.

Lánihámarkið fyri 1. veðrættarlánum er sett til 60% av metingarvirðinum, um hert verður lánt út til 1. veðrætt. Um eisini verður lánt av realinum við 2. veðrætti er markið fyri 1. veðrætti 50%. Tað verður mett ráðiligt at hækka markið nakað, eitt nú 10%, tá bert verður lánt til 1. veðrætt.

Verður lánt bæði móti 1. og 2. veðrætti er hámarkið 70%. Tað kann hugsast, at 2. veðrættarlán verður veitt saman við síðustillaðum 2. veðrætti frá øðrum lánistovni. Tá verður vandin fyri missi býttur við annan lánstovn, og tá verður hámarkið 80%.

Í móti at áramálið áður hevur verið 10 við møguleika fyri at leingja til 15 ár, verður hetta broytt til ávikavist 15 og 20 ár.

Tá tvingsilssølurnar vóru í hæddini fyri nøkrum árum síðani, hendi tað stórsæð altíð, at realurin yvirtók skipini á tvingsilssølu sum veðhavari fyri síðani at selja tey víðari. Fyri at verja síni veðrættindi uttan at missa pening, vóru skipini seld aftur eftir slíkum treytum, at størsti parturin av lánsskuldini var verandi í skipinum og yvirtikin av keypara við tí avleiðing, at formella hámarkið uppá 50% varð sprongt. Hetta var stovnurin noyddur tít fyri at verja sínt veð og hevði sostatt eisini heimild og skyldu tit hetta. Men skotið verður upp, at formlig regla verður fest um hetta beinleiðis í lógina sum stk. 5.

Fyri at Realurin ikki skal kom í ta støðu at vera ov bundin av einum lántakara ella konsern verður skotið upp at regulera hetta við stk. 6.

Að § 9. Orðingin í verandi § 15 er ikki tíðarhóskandi. Tí verður skotið upp, at tað verður víst til lógina um skipaskráseting og tinglýsingarlógina, sum regulera hvat er umfatað av skrásettum/tinglýstum veði.

Að § 10. Innihaldið er stórt sæð tað sama sum í verandi § 12, hóast orðingin er nakað øðrvísi.

Að § 11. Innihaldið er tað sama sum í verandi § 18, men orðingin gjørd meira nútímans.

Að § 12. Greinin er orðað á sama hátt sum verandi § 20, tó soleiðis at ásetingin um stempulfrælsi er strikað. Stempulgjøld verða ikki nytt í Føroyum. Stk. 3 í verandi § 20 er eisini strikað.

Að § 13. Skotið verður upp at kap.5 leggur fyri við § 13 um tað almenna eftirlitið, sum landsstýrismaðurin í búskaparmálum kemur at hava. Til at hava eftirlitið um hendur, tilnevnir landsstýrismaðurin í búskaparmálum ein grannskoðara, eins og gjøllari reglur verða ásettar í reglugerð um uttanbýsiseftirlitið. Um sjálva grannskoðanina verður víst til § 15.

Realurin verður ikki umfataður av lógini um vinnurekandi grunnar, tá stovnurin er vorðin til við lóg, og tað samb. hesi er eitt alment eftirlit.

Að § 14. Lítið og einki stendur í verandi lóg um roknskap og fíggjarstøðu, sí verandi § 19. Tí skjytur landsstýrið upp, at ein grein ásetur hetta, sum eisini verður meira útgreinað í viðtøkunum.

Ad. § 15. Landsstýrið heldur tað vera nóg mikið, at roknskapurin verður grannskoðaður av einum løggildum grannskoðara.

Ad. § 16. Her er stórt sæð sama orðing sum í verandi viðtøkum § 32 stk.2.

Ad. § 17. Í staðin fyri sum áður, tá forsætismálaráðið tók avgerð um ognirnar hjá stovninum eftir tilmæli frá løgtinginum, um stovnurin helt uppat við virksemi sínum, verður skotið upp, at tað nú er landsstýrismaðurin í búskaparmálum, somuleiðis eftir tilmæli frá løgtinginum.

Ad. § 18. Landsstýrið metir, at nýggja lógin kemur í gildi sum løgtingslóg, samstundis sum verandi lóg nr. 60 frá 12. mars 1955 um Færøernes Realkreditinstitut verður sett úr gildi.

Landsstýrið roknar við, at ríkistrygdin, sum er veitt fyri lánsbrøv, verður varðveitt inntil lánsbrøvini eru allutgoldin. Landsstýrið tekur samband við donsku stjórnina um hendla spurningin.

Viðtøkur
fyri
Føroya Realkreditstovn (Realin)

Við heimild í § 4 í løgtingslóg nr. _____. frá __ __ um Føroya Realkreditstovn (Realin) fyriseti landsstýrið hesar viðtøkur.

Kapittul 1
Endamál

Føroya Realkreditstovnur, ið varð stovnaður við lóg nr. 60 frá 12. mars 1955, heldur fram sum sjálvsognarstovnur við navni FøroyaRealkreditstovnur (Realurin).

Endamál stovnsins er at veita lán við veð í fiskiførum, íðtandi eindum og førum í frálandsvinnu og fiskauling við heimstaði í Føroyum.

Kapittul 2
Leiðsla stovnsins

Stovnurin verður stjórnaður av einari trímannastjórn, ið verður tilnevnd av landsstýrismanninum í búskaparmálum.

Tilnevningin er fyri 5 ár í senn.

Tann stjórnarlimur, sum skal tilnevnast í 1998, verður tilnevndur fyri 3 ár. Teir stjórnarlimir, ið skulu tilnevnast úr 2000, verða eftir lutakasti tilnevndir fyri ávikavist 3 og 5 ár.

Stjórnarlimur kann verða endurtilnevndur.

Stjórnin hevur ábyrgdina av leiðsluni av virksemi stovnsins samsvarandi lógini og viðtøkunum.

Eingin avgerð kann verða tikin uttan í minsta lagi 2 stjórnarlimir taka lut í avgerðini.

Hvør stjórnarlimur ser ábyrgir stovnin við undirskrift sínari, er ikki annað ásett, jfr. §§ 7 og 10.

Landsstýrið ger av setanartreytirnar hjá stjórnarlimunum.

§ 3. Stjórarnir býta virksemi stovnsins sínámillum. Teir kunnu lata dagligu leiðsluna av virksemi stovnsins upp í hendurnar á einum stjórnarlimi ella seta ein undirstjóra at taka sær av henni.

§ 4. Stjórnin setir starvsfólk, metingarmenn íroknaðir. Landsstýrismaðurin í búskaparmálum verður kunnaður um setan av undirstjóra og metingarmonnum.

§ 5. Umboðsnevndin virkar sum ráðgevandi nevnd fyri stjórnina. Hon ummælir roknskap og ársfrágreiðing. Stjórnin kunnar umboðsnevndina um virkseni stovnsins og boðar henni til fundar í minsta lagi eina ferð um árið.

Stjórnin skipar fyri vali av umboðsnevndarlimum.

Valt verður í februar mánað við gildi frá 1. mars.

Fyri val av lántakaraumboðunum í umboðsnevndini eru hesar reglur galdandi:

Fráboðanir um valevni undirskrivaðar av í minsta lagi 5 lántakarum verða sendar stjórnini innan 2. januar í tí álmanakkaári, ið veljast skal.

Atkvøtt verður skrivliga við atkvøðuseðlum, ið verða sendir lántakarunum innan 1. februar. Valevnini skulu standa í bókstavarøð á atkvøðuseðlunum. Atkvøtt kann verða fyri 2 valevnum á hvørjum atkvøðuseðli. Atkvøðuseðlarnir, ið skulu vera undirskrivaðir persónliga, skulu vera stovninum í hendum í seinasta lagi tann 15. februar.

Koma eingi uppskot um valevni inn, kunnu teir lántakarar, ið eru valdir frammanundan, verða roknaðir at vera afturvaldir uttan atkvøðugreiðslu, um teir skrivliga hava váttað fyri stjórnini at taka við afturvali. Taka teir ikki við afturvali og eingi uppskot um valevni eru innkomin rættstundis, kann stjórnin velja limirnar.

Eingin umboðsnevndalimur kann verða valdur ella afturvaldur eftir at hann hevur fylt 70 ár.

§ 6. Metingarmenninir skulu í minsta lagi vera 3 í tali, ein teirra kønur í skipabygging, ein maskinkønur og ein hava praktiskar royndir í fiskiskapi umfram skil á fiskivinnubúskapi.

Stjórnin kann í serligum førum gera av, at metingin og eftirlitið skal verða gjørt av øðrum metingarmonnum enn stovnsins.

Metingarmenninir eru sakkønu álitismenn stjórnarinnar. Teir meta um tey veð, ið boðin verða stovninum, áðrenn lán verður játtað, hava eftirlit við teimum veðsettu ognunum og geva váttanir um stand og virði á einum veði, áðrenn stjórnin tekur avgerð um yvirtøku ella sølu av tí.

Metingarmenninir fáa samsýning fyri arbeiði sítt. Støddin á samsyningini verður ásett av stjórnini.

Stjórnin kann gera av, at samsýningin skal endurrindast stovninum, heilt ella partvís, av lántakaranum.

Eingin kann virka sum metingarmaður eftir at hann hevur fylt 70 ár.

Kapittul III
Lántøka stovnsins

§ 7. Umfram grundfæið kann stovnurin útvega sær útlánspening við útgávu av skuldarbrøvum ella handhavaralánsbrøvum ljóðandi uppá stovnin samsvarandi galdandi reglum um virðisbrøv.

Undirskrift krevst frá øllum stjórnarlimunum, skal samtykt eftir 1. stk. hava gildi.

Áljóðandi upphæddin tilsamans av teimum útgivnu lánsbrøvunum í umlæri til hvørja tíð og øðrum skuldarbrøvum má ikki fara upp um fimmfulda grundfæið við seinasta roknskaparársluk.

Landsstýrismaðurin í búskaparmálum kann gera av eftir tilmæli frá stjórnini at, tá lutfallið millum grundfeið og lán tikin til grundfeið verða útroknað, skulu tilfar lánsupphæddir verða tiknar við, sum sambært lánitreytunum víkja fyri øðrum lánum, stovnurin hevur tikið, og fyrst og fremst skulu brúkast til gjaldingar av teimum.

Landsstýrismaðurin í búskaparmálum kann, um serlig viðurskifti skuldu tala fyri tí, eftir tilmæli frá stjórnini loyva, at áljóðandi av lánsbrøvunum og skuldabrøvunum kann vera upp til sjeyfalda grundfeið.

§ 8. Samlaða upphæddin av skyldum stovnsins fyri upptikin lán verður mótsvarað av veðbrøvum til stovnin fyri í minsta lagi ta mótsvarandi upphæddina.

Renting og afturgjalding av lánsbrøvum verður gjørd samsvarandi galdandi reglum fyri virðisbrøv, meðan útlánspeningur útvegaður á annan hátt verður rentaður og afturgoldin samsvarandi teimum avtalaðu treytunum.

Kapittul IV
Útlán stovnsins

§ 9. Umsóku um lán frá stovninum verður skrivað á umsóknarblað, ið somuleiðis sigur hvørjar upplýsingar og hvørji skjøl skulu sendast inn saman við umsóknini. Ognir, ið verða boðnar í veð, verða virðismettar eftir reglunum í §§ 19-21.

Fyri virðismetingina og aðrar útreiðslur av lánsupptøkuni verður goldið eitt av stjórnini ásett gjald.

§ 10. Lánsupphæddir, renta, afturgjaldingartíð og aðrar treytir verða settar av stjórnini sambært teimum reglum, ið ásettar eru í viðtøkunum

Stovnurin kann veita lán við 1. og 2. veðrætti. Lán við 1. veðrætti kunnu ikki fara upp um 60% av metingarvirðinum, tá lán við 2. veðrætti ikki verður veitt. Verður lán veitt við 2. veðrætti, er markið fyri 1. veðrættarláni 50%.

Lán við 2. veðrætti kunnu verða veitt innan peningakarm svarandi til 30% av eginpeninginum, gjørdur upp sum grundfæ og tiltaksgrunnar. Tey kunnu einans verða veitt saman við 1. veðrættarlánum og kunnu ikki fara upp um 70% av metingarvirðinum. Lán kann tó veitast upp til 80% av metingarvirðinum, verður lánið veitt við javnsettum veði frá aðrari fíggjarkeldu.

Afturgjaldstíðin av lánunum kann ikki vera longri enn 15 ár. Stjórnin kann tó í afturgjaldingartíðini, um serligar umstøður tala fyri tí, loyva at avdráttir verða lækkaðir ella at gjaldfreist verður veitt, soleiðis at afturgjaldingartíðin verður longd til í mesta lagi 20 ár.

Farið kann verða upp um tey í 2. og 3. stk. nevndu lánihámark, tá veðsettar ognir, ið eru yvirtiknar á tvingsilssølu ella undir líknandi umstøðum, verða seldar aftur, um sleppast kann undan óneyðugum fíggjartrissi á hendan hátt.

Stovnurin kann ikki veita lán til ein lántakara ella ein bólk av sínámillum sambundnum lántakarum, ið fara upp um 25% av stovnsins ognum (grundfæ og tiltaksgrunni).

Til játtan av láni krevst undirskrift av í minsta lagi tveimum stjórnarlimum, jbr. tó § 5, 2. stk. í lógini.

§ 11. Lán verða bert veitt við trygd í teimum í § 1 nevndu ognum. Veðsetingin fevnir um ognina við tilhoyri sambært skipaskrásetingar- og tinglýsingarlógini og somuleiðis tryggingarupphæddina fyri ta veðsettu ognina.

Lán kunnu verða veitt bæði til nýbyggingar og umbyggingar, útskifting av motori v.m. íroknað, eins og í serstøkum førum til eldri ognir, fígging av eigaraskifti og innfrían av lántum við tyngjandi avdráttarbyrði íroknað.

Veðsettu ognirnar við tilhoyri skulu støðugt vera forsvarliga tryggjaðar í tryggingarfelag, sum landsstýrið góðkennir.

§ 12. Játtað lán verða útgoldin kontant við rentu og kursi, ið stjórnin ásetir við atliti til, at stovnurin verður hildin skaðaleysur fyri møgulig kurstap av teimum lánum, hann sjálvur hevur tikið.

Tey veðbrøv, ið eru veitt sum trygd fyri lánunum kunnu ikki verða avhend til ognara ella sum trygd; eiheldur kann einstaklingsrættarsókn fremjast móti teimum. Reglur um hetta verða tilskilaðar á framsíðuni á veðbrøvunum.

§ 13. Lántakararnir ábyrgjast við veðsettu ognunum við samábyrgd (solidariskt) fyri skyldum stovnsins, hvør teirra við einari upphædd, ið svarar til lánsbøvuðsstólin. At veita fulnað fyri hesa ábyrgd kann stjórnin gera av, jbr. § 14 stk. 3, at kravt skal verða eykagjald til tiltaksgrunnin.

Stjórnin kann avmarka samábyrgdina til bert at galda fyrt flokkar av ognum við einsháttaðum ábyrgdarvanda. Gjøllari reglur um tílíka avmarking verða gjørdar av stjórnini við góðkenning landsstýrisins.

Lántakarar, ið hava goldið teirra lán, fáa ikki kvittan fyri at teir eru loystir frá samábyrgdini, fyrenn 3 mánaðir eru gingnir frá tí at roknskapurin fyri tað roknskaparárið, ið lánið varð goldið í, er sendur landsstýrinum, og landsstýrið ikki hevur nytt høvi til at gera viðmerkingar um rættleikan av roknskapinum ella tikið staðiligt fyrivarni. Tó kann kvittan verða givin, um tiltaksgrunnurin við roknskaparárslok er í minsta lagi 20% av skuldarábyrgdum stovnsins.

§ 14. Hvørja ferð lán verður tikið, verður 1% av høvuðsskuld lánsins goldið sum innskot í tiltaksgrunnin, jbr. § 22. Stjórnin kann loyva, at innskotið verður goldið við upp til 4 eins stórum gjøldum, ið verða goldin, tá lánið verður útgoldið og teir næstkomandi lánsgjalddagarnar, um viðkomandi veðbrævi gevur somu trygd fyri ógoldnum innskoti sum fyri lánunum, rentum og øðrum gjøldum. Hvønn gjalddag verður goldið eitt gjald til tiltaksgrunnin. Støddin á gjaldinum verður ásett av stjórnini tá lánið verður tikið sum ein fastur prosentpartur av lánsins høvuðsskuld.

Er tiltaksgrunnurin minni enn 2% av stovnsins skuld, kann stjórnin við 3 mánaða freist til ein gjalddag krevja so stór eykagjøld til grunnin, sum neyvt álíknað í lutfalli til vanligu hálvársgjøldini, eru neyðug til tess at økja fæ grunsins upp til nevndu upphædd.

§ 15. Lánið verður alfurgoldið yvir eins nógvar gjalddagar, ið ásettir vórðu, tá lánið varð tikið, annaðhvørt við eins stórum ella skiftandi avdráttum, jbr. tó § 10, 4. stk. og § 17, 1. stk. Avdráttirnir verða goldnir saman við rentum av restskuldini og gjøldum til tiltaksgrunnin hvønn 1. mai og 1. november.

Av hálvársgjøldum, ið ikki verða goldin í seinasta lagi ávikavist 20. mai og 20. november, verður dragurenta goldin av gjaldkomnu upphæddini frá gjalddegnum til goldið verður. Dragurentan verður ásett av stjórnini við atliti at føroyska rentustiginum.

§ 16. Tey lán, ið stovnurin veitir, kunnu ikki verða søgd upp av stovninum, so leingi viðkomandi lánkatari heldur skyldur sínar í øllum lutum, men eru fallin til gjaldingar, ger hann ikki tað.

Lánini falla til gjaldingar við eigaraskifti, men stjórnin kann loyva, at nýggi eigarin yvirtekur tey.

§ 17. Hvør lántakari hevur rætt at gjalda alla lánsskuldina ella rinda eykaavdráttir av lánunum við 3 mánaða freist til ein 1. mai ella 1. november. Eykaavdráttir skulu tó rindast við upphæddum, ið kunnu býtast við 1000.

Viðvíkjandi kvittan fyri samábyrgdina av lánunum verður víst til § 13, 3. stk. og viðvíkjandi útgjaldi av parti í tiltaksgrunninum til § 22.

§ 18. Kvittanin, ið latin verður einum lántakara fyri hálvársgjøldini eftir § 15, skal sundurgreina gjaldnu upphæddina og syna restskuldina av láninum.

Kapittul V
Virðismeting

§ 19. Virðismetingin av einari ogn, ið boðin verður stovninum í veð, verður gjørt av í minsta lagi 2 av metingarmonnum stovnsins.

Stjórnin kann gera reglugerð fyri framgongdini í sambandi við virðismetingina, og verður gingið eftir hesi reglugerð í øllum lutum.

§ 20. Metir stjórnin at ognin møguliga ikki longur gevur neyðuga trygd fyri láninum, kann hon krevja nýggja virðismeting.

Útreiðslurnar av tílíkari meting kunnu verða krevdar endurgoldnar av lántakaranum, um hann var atvoldin í, at metingin var neyðug. Verður úrslitið, at lánið fer upp um lánihámarkini sambært § 10 av virðinum á ognini eftir teirri nýggju metingini, kann stjórnin uppsiga lánið til gjaldingar uttan drál.

§ 21. Tann, ið søkir um lán, hevur skyldu at geva metingarmonnunum allar neyðugar upplýsingar um ognina og at undirskriva váttan á metingarskjalinum um at hann hevur givið tær upplýsingar, hann er biðin um, eftir bestu sannføring.

Kapittul VI
Tiltaksgrunnur

§ 22. Ein tiltaksgrunntur er stovnaður at standa ímóti tapi av stovnsins útlánum.
Í hendan grunnin verða løgd tey í § 14 nevndu innskot, gjøld og eykagjøld, stovnsins egnu rentuinntøkur og rakstraravlop.

Fæið í tiltaksgrunninum kann ikki verða lænt út, men skal standa í lættseljandi virðisbrøvum eftir teimum reglum, ið galdandi eru fyri peningaognir ómyndinga.

Við hvørt roknskaparárslok verður uppgerð gjørd yvir grunnin, og við støði í hesi uppgerð verður støddin á grunninum í mun til samlaðu skuld stovnsins útroknað.

Tað innskot, ein lántakari rindaði í tiltaksgrunnin tá lánið varð tikið, verður afturgoldið honum, tá lánið er fult afturgoldið, sí niðanfyri.

Útgoldið verður ikki fyrrenn kvittan kann verða givin fyri teirri samábyrgd, ið liggur við lánunum, jbr. § 13, 3. stk.

Einki verður goldið út, um tiltaksgrunnurin á hendan hátt fer niður um 20% av stovnsins skuld.

Er grunnurin ikki nóg stórur til at kunna gjalda innskotini hjá øllum fyrrverandi lántakarum, verður fyrst goldið til teir lántakarar, ið hava goldið lán sítt aftur í eldri roknskaparárum og síðan til teirra, ið hava goldið síni lán seinni.

Kann eitt innskot ikki verða goldið aftur sambært reglunum frammanfyri í seinasta lagi 5 ár eftir at tað roknskaparárið er runnið, sum lánið varð afturgoldið í, missir låntakarin krav sítt um afturgjalding av innskotinum.

§ 23. Tiltaksgrunnurin skal vera í minsta lagi 10% av samlaðu útlánum stovnsins ella 20% av skuld stovnsins, alt eftir hvør upphæddin er tann hægra.

Fer tiltaksgrunnurin við eitt roknskaparárslok upp um omanfyri nevndu mørk, kann tann upphæddin, ið fer uppum eftir avgerð stjórnarinnar verða flutt til grundfæið.

Kapittul VII

§ 24. Umsiting, roknskapur, grannskoðan v.m.

Umsitingarútreiðslur grunsins verða goldnar av rentuinntøkunum av útlánum og øðrum inntøkum stovnsins í tann mun hesar ikki hoyra tiltaksgrunninum til, jbr. § 22.

§ 25. Roknskaparár stovnsins gongur frá 1. apríl til 31. mars.

Í sambandi við roknskaparuppgerðina skulu tey virðishrøv, ið stovnurin eigur, og hvørs kursur verður skrásettur alment, virðissetast til meðaltalið av seinasta keyparakursi við roknskaparárslok og tilsvarandi kursir seinastu 9 árini. Tann soleiðis ásetti kursurin má tó ikki fara upp um tann digna kursin. Aðrar ognir mega ikki verða virðissettar hægri enn veruliga virðið. Tílíkar avskrivingar og avsetingar verða gjørdar, sum eru neyðugar til tess at svara fyri staðfestum ella væntandi fíggjarmissi av yvirtiknum veðum, eftirstøðum og øðrum ognum.

§ 26. Frágreiðing um virksemi stovnsins avvarðandi roknskaparár verður givin saman við roknskapinum. Frágreiðingin skal hava upplýsingar um støddina av samlaðu útlánum stovnsins býtt sundur millum ymiskar bólkar av ognum, um veðsetingarprosent í mun til keypspening av veðum, ið hava skift eigara, um veð, ið eru yvirtikin frammanundan, men ikki avhend við byrjan roknskaparársins, og um rey veð, ið eru yvirtikin í roknskaparárinum við upplýsingum um, hvussu nógv av teimum yvirtiknu veðunum eru seld, fíggjarmissur ella vinningur tilsamans av hesum og um støddina av gjørdum avskrivingum av veðum.

Frágreiðing og roknskapur verða løgd fyri umboðsnevndina til ummælis og verða við grannskoðaraviðmerkingum sendar landsstýrismanninum í búskaparmálum í seinasta lagi 4 mánaðir eftir roknskaparárslok í seinasta lagi ein mánað eftir hvørt fjórðingsárslok sendir stjórnin landsstýrismanninum í búskaparmálum úrtak úr roknskapi stovnsins.

1. viðgerð týsdagin 17. mars 1998. Uppskotið varð beint í fíggjarnevndina.

Málið fall burtur sbr. stýrisskipanarlógini § 15 stk. 3, tí at løgtingsval var 30. apríl 1998, og málið ikki var tíðugt viðgjørt á tingi fyri valið.

F.I., j.nr. 2567-3/91

156 Uppskot til løgtingslóg um umsiting av gjaldførislánum

Ár 1998, hósdagin 5. mars, legði Anfinn Kallsberg, landsstýrismaður, vegna landsstýrið fram soljóðandi

Uppskot
til
løgtingslóg um umsiting av gjaldførislánum

§ 1. Landsstýrinum verður heimilað at gera avtalu við Føroya Realkreditstovn um framhaldandi umsiting av gjaldførislánum, sum eru veitt ella játtað sambært løgtingslóg nr. 24 frá 1. juni 1978 um endurnýggjan av fiskiskipaflotanum sum m.a. broytt við løgtingslóg nr. 35 frá 3. mai 1984.

§ 2. Í tann mun gjaldførislán veitt og játtað í tíðarskeiðnum 1. mai 1984 til 31. desember ár 2000 verða afturgoldin, umløgd ella umfíggjað, fær landsstýrismaðurin heimild til at avtala við Føroya Realkreditstovn, at frígjørda tánsupphæddin kann lænast út aftur sum 2. veðrættarlán til lántakarar, ið fáa 2. veðrættarlán frá realinum. Lánini verða tryggjaði við sífellt stillaðum 2. veðrætti saman við realkreditstovninum, og verða annars veitt sambært reglunum í løgtingslóg um Føroya Realkreditstovn.

§ 3. Avtala millum landsstýrismannin og Føroya Realkreditstovn, gjørd við heimild í hesi lóg, fær gildi frá 1. mai 1998 at rokna, og verður í gildi til 1. mai ár 2010. Nevnda avtala skal m.a. áseta treytir um rentu til landsstýrið og umsitingina annars.

§ 4. Áðrenn 1. mai ár 2009 skulu samráðingar millum landsstýrismannin og Føroya Realkreditstovn verða loknar og avgerð tikin um, hvørvið umsitingaravtalan sambært hesi lóg skal halda fram ella afturgjalding byrja eftir teimum treytum, ið galdandi verða fyri einstøku lánini.

§ 5. Henda lóg kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

Viðmerkingar

Við løgtingslóg nr. 35 frá 3. mai 1984, sum er ein broyting í løgtingslóg nr. 24 frá 1. juni 1978 um endurnýggjan av fiskiskipaflotanum, varð møguligt at veita gjaldførislán.

Ætlanin við lógini var, at hóast lánsbrøv útgivin av realinum skuldu afturgjaldast yvir 10 ár, og lán veitt av realinum somuleiðis afturgjaldast yvir 10 ár, skuldu útvegir finnast fyri at geva skipaeigarum møguleika fyri eintum 2 ára avdráttarskáa, og sostatt longt lánstíðina til 12 ár. Hetta skuldu gerast, við at landskassin gjøgnum realin veitti skipaeigarum eitt gjaldførislán svarandi til avdráttirnar tvey tey fyrstu árini, ið hann annars skuldi goldi realinum. Skipaeigarin skuldi so afturgjalda landsstýrinum lánið í 11. og 12. ári, tá lánið til realin var afturgoldið.

Gjaldførislánið skuldi tryggjast antin saman við láninum frá realinum ella beint aftaná. Í praksis hava gjaldførislánini havt 2. veðrætt.

Realurin hevur eftir serligari avtalu við landsstýrið umsitið lánini vegna landsstýrið so sum gjørt og skrásett veðbrøv, kravt inn frá lántakarum, amboðu landsstýrið á tvingsilssølum o.s.fr.

Eftir nýggju lógini um realkreditstovnin verður møguleiki at veita 15 ára lán við leingjan upp til 20 ár, og tí er nú ikki sami tørvur fyri nýggjum gjaldførislánum sambært upprunaligu grundgevingunum

Men við nýggju lógini um Føroya Realkreditstovn verður møguleiki at veita 2. veðrættarlán við eini samlaðari lánsveiting upp til umr. 130 mió. kr. í byrjanini.

Ætlanin er at fáa aðrar lánsveitarar eisini at veita 2. veðrættarlán við trygd sum síðustilladum 2. veðrætti saman við realinum og landsstýrinum. Samtaka lógini um realkreditstovnin verður møguleiki at veita lán upp til 80% av metingarvirðinum, tá lán verða veitt við síðustilladum 2. veðrætti. Við slíkari lánsveiting, koma fleiri lánsveitarar at býta tapsvandan.

Nógv bendir á, at stuðulin til fiskivinnuna minkar munandi ella fellur burtur. Tí kundi hetta verið ein bóskandi møguleiki at fáa útlænta pening landsstýrisins útaftur í tað umfar, hann upprunaliga varð lentur til.

Hjálagt yvirlit yvir grundgina viðvíkjandi gjaldførislánum sum sigur, at landsstýrið yvir 15 ár hevur mist góðar 14 mió. kr. og móttikið í rentu slakar 37 mió. kr.

Tíðarskeiðið 1985-2000

Landsstýrið útgoldið lán	**97.818.000,00**
Játtað 1998-2000	**6.000.000,00**
	103.818.000,00
Afturgoldið í samband við sølu av skipum	**30.142.238,72**
Mist í samband við tvingsilssølur	**14.119.761,28**
Verandi lán við veð í føroyskum skipum	**53.556.000,00**
Renta goldin til Føroya Landsstýri	**36.735.834,16**
Heimildin til endurútlán snýr seg um	**59.556.000,00**

1. viðgerð týsdagin 17. mars 1998. Uppskotið varð beint í fíggjarnevndina.

Málið fall burtur sbr. stýrisskipanarlógini § 15 stk. 3, tí at løgtingsval var 30. apríl 1998, og málið ikki var liðugt viðgjørt á tingi fyri valið.

F.L. j.nr. 2567-3/91

157 Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um føroyskan happadrátt

Ár 1998, hósdagin 5. mars, legði Eilif Samuelsen, landsstýrismaður, vegna Edmund Joensen, løgmann, vegna landsstýrið fram soljóðandi

Uppskot
til
løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um føroyskan happadrátt

§ 1.

Í løgtingslóg nr. 49 frá 15. juni 1950 um føroyskan happadrátt við seinni broytingum verður § 1, litra e strikað.

§ 2.

Henda lóg fær gildi 1. januar 1999.
Stk. 2. Samstundis sum henda lóg fær gildi fer danski teksturin í Í løgtingslóg nr. 49 frá 15. juni 1950 við seinni broytingum úr gildi.

Viðmerkingar

Av vinningum av spølum, verður til landskassan, í staðin fyri vanligan inntøkuskatt, latið eitt gjald, sum er ein ávisur prosentpartur av vinninginum. Prosentparturin, sum latin verður, er ásettur hæddi í burturlutitingar-

lógini, sum almennt ásetur gjald av vinningum av spølum til landskassan, og í serlóggávuni, sum regulerar økið annars. Hetta er óheppið, tí tað ger, at ivi kann vera um hvør lóg, ið nýtast skal, og tí, at hetta ger, at prosentparturin, ið latast skal landskassanum, sum gjald av vinningum av spølum verður ymiskur, alt eftir hvør lóg regulerar økið annars. Tí verða ásetingarnar í verandi serlóggávu um gjald av vinningum til landskassan avtiknar soleiðis, at hereftir verða ásetingarnar um gjøld av vinningum av spølum í einari lóg, burturlutingarlógini, sum samstundis við hesum verður løgd fyri tingið.

Til § 1. Í uppskotinum til nýggja burturlutingarlóg er skotið upp, at gjaldið til landskassan av vinningum av øllum spølum verður tað sama fyri øll spøl, 15%. Eftir verandi happadráttarlóg er gjaldið 10%.

Til § 2. Av teknisk fyrisitingarligum grundum verða reglurnar um gjald til landskassan í verandi lóg um føroyskan happadrátt verandi í gildi til 1. januar 1999.

Í viðgerð mánadagin 16. mars 1998. Uppskotið varð beint í figgjarnevndina.

Málið fall burtur sbr. stýrisskipanarlógini § 15 stk. 3, tí at løgtingsval var 30. apríl 1998, og málið ikki var liðugt viðgjørt á tingi fyri valið.

F.L. j.nr. 664-1/98

158 Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um ítróttarvedding

Ár 1998, hósdagin 5. mars, legði Eilif Samuelsen, landsstýrismaður, vegna Edmund Joensen, løgmann, vegna landsstýrið fram soljóðandi

Uppskot
til
løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um ítróttarvedding

§ 1.

Í løgtingslóg nr. 50 frá 20. mai 1983 um ítróttarvedding við seinni broytingum verða gjørdar hesar broytingar:

1. Í §§ 1, stk. 1, 2. pkt. verður eftir orðini "norðurlendskar veddingar" sett: " , eisini um onnur spøl".
2. Í § 1 verður sum 3. pkt sett: "Í sambandi við, at landsstýrið gevur loyvi til, at veddingin samstarvar við onnur norðurlond, kann landsstýrið góðkenna, at reglurnar í hesum londum verða nýttar".
3. § 5 verður strikað.

§ 2.

Henda lóg kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

Viðmerkingar

Uppskotið verður framlagt fyri at gera nakrar dagføringar og nágreiningar av ásetingunum í lógini, og fyri at gera broytingar sum, sum fylgja av, at ásetingarnar um avgjaldið, ið latast skal landskassanum av vinningum av spølum, hereftir verða settar í eina lóg, burturlutingarlógina, og verður uppskot um hetta lagt fyri tingið samstundis við hesum.

Viðvíkjandi fíggjarligum avleiðingum av uppskotinum verður víst til viðmerkingarnar til tað samstundis framlagda uppskotið um burturlutingarlóg.

Til § 1, nr. 1. Hendan broytingin verður skotin upp, fyri at øll spøl, sum Dansk Tipstjeneste bjóðar út í Danmark, heruppí tey somevndu "skavispølini" eisini kunnu verða útbodin í Føroyum.

Til § 1, nr. 2. Hetta er ein nágreining av galdandi reglum soleiðis, at ivi ikki longur skal verða um, at landsstýrið hevur hesa heimild.

Til § 1, nr. 3. Broytingin, sum skotin er upp, er ein fylgja av, at allar ásetingar um avgjald av vinningum av spølum hereftir verða í einari lóg, burturlutingarlógini.

I. viðgerð mánadagin 16. mars 1998. Uppskotið verð beint í nevndarvanlina.

Málið fall burtur sbr. stýrisskipanarlógini § 15 stk. 3, tí at løgtingsval var 30. apríl 1998, og málið ikki var liðugt viðgjørt á tingi fyri valið.

F.L.j.nr. 663-4/98

159 Uppskot til løgtingslóg um keyp av flakavirkinum í Vági

Ár 1998, hósdagin 5. mars, legði Henrik Old, løgtingsmaður, vegna seg sjálvan fram soljóðandi

UPPSKOT
til
løgtingslóg um keyp av flakavirkinum í Vági

§ 1. Landsstýrinum verður heimilað at taka upp samráðingar við eigararnar av flakavirkinum í Vági (fyrrverandi Polarfrost) um keyp av virkinum.
Stk. 2. Landsstýrið hevur skyldu at selja virkið viðari til tann hægstbjóðandi, sum vil átaka sær at fáa virksemið í gongd aftur á flakavirkinum.

§ 2. Tá endaligt uppskot um keypsavtalu fyriliggur, verður ásett í eykajáttanarlóg, hvørja upphædd landsstýrinum verður heimilað at brúka til keypið.

§ 3. Henda løgtingslóg fær gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

Almennar viðmerkingar

Lógaruppskotið hevur til endamáls at fáa sjálvt flakavirkið í Vági í vinnu aftur eftir eina stoðg upp á 3½ ár. Seinasti arbeiðsdagur á flakavirkinum var 2. oktober í 1994, og hava allar royndir síðani at fáa virkið í gongd aftur higartil verið miseydnaðar.

Hvørki Fiskavirking ella seinni Fiskavirkingargrunnurin hava viljað hava virkið í gongd, og treytirnar settar eftir um,ið royna hava, hava verið so út av lagi hardar, at eingin møguleiki hevur verið til staðar at byrja aftur. Tá seinasta umlegging av eigaraviðurskiftunum í Føroya Fiskavirking fór fram fyri góðum ári síðani, økstust vónirnar aftur, tí tá varð Fiskavirking býtt sundur. Átta virkir vórðu eftir í Fiskavirking, ið øll skuldu í gongd, meðan restin varð yvirtikin av einum felag hjá Føroya Banka. Tíbetur eru flestu virkini, sum vórðu loyst frá fiskavirking, so líðandi komin í gongd aftur.

Av teimum átta virkjunum, ið Fiskavirking hevði eftir, var flakavirkið í Vági eitt. Men heldur ikki hesarferð er nøkur vón fyrí virksemjinum á flakavirkinum í Vági, so greitt er, at Fiskavirking fekk virkið í Vági í sín bólk við einum endamáli, tað, at einki virksemi skal verða har.

Fyri syðru helvt av Suðuroy hevur hetta havt katastrofalar fylgjur, sum eisini oftа er víst á, og av hesi orsøk er arbeiðsloysið framvegis størst í hesum partinum av landinum. Landsstýrið er helst einasti instansur, ið kann trysta Framtaksgrunnin og Fiskavirking at selja virkið treytaleyst. Tí hevur landsstýrið val av stuðli til Fiskavirking fyri at halda virkseminum í gongd á ávísum støðum. Tí er landsstýrið helst einasti instansur, ið kann loysa hetta trupla mál.

Hvørjar fíggjarligar avleiðingar uppskotið vil hava, kann ikki verða staðfest, fyrr enn endaligt uppskot um keypsavtalu fyriliggur. Tá verður uppskot lagt fyrir tingið um eykajáttanarlóg, ið skal áseta, hvørja upphædd landsstýrinum verður heimilað at brúka til keypið. Víst verður í hesum sambandi til viðmerkingarnar til § 2 niðanfyri.

Viðmerking til einstøku greinirnar

Ad. § 1. Sambært § 1, stk. 1, fær landsstýrið heimild til at samráðast um og fáa til vega endaligt uppskot um keypsavtalu við eigararnar av flakavirkinum í Vági. Áðrenn landsstýrið bindur seg til keypið, er tó sambært § 2 neyðugt, at samtykt verður uppskot til eykajáttannarlóg, ið ásetir, hvør upphædd kann verða brúkt til keypið.

Endamálið við lógaruppskotinum er at fáa virksemið í gongd aftur á flakavirkinum í Vági. Tá landsstýrið hevur keypt virkið, skal landsstýrið í sambært stk. 2 selja tað víðari til hægstbjóðandi, sum vil átaka sær at fáa virksemið í gongd aftur. Neyðugt er ikki í hesum sambandi við játtan á fíggjarlógini, tá sølan má metast at verða til marknaðarpris.

Ad. § 2. Fyri ikki at útiloka landsstýrissins møguleika fyri at samráðast um prís fyri keyp av virkinum, er ikki møguligt í sambandi við hetta lógaruppskotið at taka avgerð um, hvørja upphædd landsstýrinum skal verða heimilað at brúka til keypið.

Ad. § 3. Lógin skal koma í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

Málið fall burtur sbr. stýrisskipanarlógini § 15 stk. 3, tí at løgtingsval var 30. apríl 1998, og málið ikki var liðugt viðgjørt á tingi fyri valið.

160 Uppskot til samtyktar um útskriving av nývali

Ár 1998, hósdagin 5. marts, legði Tordur J. Nielsen, løgtingsmaður, vegna Miðflokkin fram soljóðandi

Uppskot
til
samtyktar um útskriving av nývali

Vísandi til § 6 í løgtingslóg nr. 103 frá 26.07.94 um stýrisskipan Føroya í sermálum samtykkir løgtingið at útskriva nýval.

Viðmerkingar

Hóast Miðflokkurin í prinsippinum er ímóti, at val verður útskrivað í úrtíð, so síggja vit okkum í hesum føri noydd at skunda undir, at nýval verður útskrivað.

Tað, at landsstýrið hevur fráboðað, at eini 60-70 mál. nú áðrenn framlagufreistin er úti, verða løgd fyri tingtíð, meta vit vera ábyrgdarleyst og ein háðan móti teim, ið valt hava politiska myndugleikan at gera og umsita landsins lógir.

Tað kann ikki vera rætt, at landsstýrið nú kemur við slíkum "uppskots-pakka" í tingið - og tað í einum valár.

Tingið fer ikki at hava neyðugar stundir at geva so nógvum uppskotum eina nágreiniliga viðgerð, og tí kann tað lættliga henda, at málini verða "skrumblað" fgjøgnum, bara tí at tað hóddar einum politiskum meirluta at gera tað.

Vit meta eina slíka mannagongd lítið sømiliga fyri løgtingið og fólkaræðisligu skipanina sum heild, og at fólkið bevur annað uppiborið.

Heldur ikki verður hildið rætt, at komandi landsstýrið skal "bindast" av samtyktum, ið framdar verða í slíkum bráðskundi av einum samgongumeirluta, hvørs skeið innan stutta tíð allíkavæl er lokið.

Havast skal í huga, at nú valár er, man lítil ivi vera um, at hetta í stóran mun fer at merkja bæði uppskot og viðgerð av málum.

Nýval skal haldast í seinasta lagi 07. juli 1998, men vilja vit við hesum uppskoti framskunda hesa útskriving, soleiðis at val kann verða 6 - 8 vikur eftir, at uppskotið er samtykt.

Løgtingsval kann sostatt verða ásett til at verða longu 1. viku av mai.

Sostatt verður eisini forðað fyri, at vit koma ov langt út á summarið, tá valdagur verður.

Í tí løtu, at uppskot til val er samtykt, so "steðgar" tingarbeiðið, og sostatt verður forðað fyri, at ein hópur av uppskotum soleiðis "í óðum verki" verða samtykt.

Hinvegin, tá talan er um "átrokandi" mál, so átti at borið til hjá samgongu og undstøðu at tala seg til sættis og funnið eina loysn, soleiðis at hesi mál kundu avgreiðast, áðrenn uppskotið um nýval varð endaliga samtykt í tinginum.

Verður uppskotið um nýval samtykt, so er tað samstundis ein greiðlig fráboðan um, at løgtingið ikki fetur alt um seg ganga - men tekur eina avgerð, sum í síðsta enda gagnar føroyska fólkinum.

1. viðgerð mánadagin 16. mars 1998. Uppskotið verður uttan nevndarviðgerð beint leiðleiðis til 2. viðgerð.

Málið fall burtur sbr. stýrisskipanarlógini § 15 stk. 3, tí at løgtingsval var 30. apríl 1998, og málið ikki var liðugt viðgjørt á tingi fyri valið.

161 Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um fólkaskúlan

Ár 1998, hósdagin 5. mars, legði Finnbogi Isakson, løgtingsmaður, vegna Sigmar á Bráuni, løgtingsmann, vegna Tjóðveldisflokkin fram soljóðandi

Uppskot
til
løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um fólkaskúlan

§ 1.

Í løgtingslóg nr. 125 frá 20. juni 1997 um fólkaskúlan verða hesar broytingar gjørdar:

1) § 2, stk. 3, verður orðað soleiðis: "Stk. 3. Fólkaskúlin skal í sátt og samvinnu við foreldrini hjálpa til at geva næmingunum eina kristna og siðalagsliga uppaling. Hann skal við støði í føroyskari mentan menna kunnleika næminganna um føroyska mentan og hjálpa teimum at fata aðrar mentanir og samspæl manna við náttúruna. Hann skal búgva næmingarnar til innlivan, samavgerð, samábyrgd, rættindi og skyldur í einum frælsum og fólkaræðisligum samfelag. Undirvísing og gerandislív skúlans eiga at vera grundað á andsfrælsi, tollyndi, javnvirði og fólkaræði."
2) Í § 5, stk. 2, nr. 1, verða orðini "donskum 3. - 9. skúlaár" broytt til: "donskum 4. - 9. skúlaár".
3) Kapittul 6 verður orðað soleiðis:

Kapittul 6
Fyrisiting av skúlaverkinum

"**§ 46.** Skúlamyndugleikin á staðnum er bygdaráðið/byráðið og skúlanevndin.

2. stk. Í hvørjari kommunu verður vald ein skúlanevnd við í minsta lagi 3 og í mesta lagi 7 limum eftir nærri av landsstýrismanninum ásettum reglum.

3. stk. Skúlanevndin verður vald samstundis og eftir somu reglum sum bygdaráðið/byráðið.

4. stk. Eftir umsókn frá byráði/bygdaráði ella skúlanevnd kann landsstýrismaðurin loyva, at ein kommuna verður býtt í fleiri øki, hvørt við sínum skútanevnd.

§ 47. Skúlanevndin velur sjálv formann og ger sær starvsskipan.

2. stk. Skúlaleiðararnir og formenninir í lærararáðunum taka lut á fundum í skútanevndini. Hevur kommunan ein leiðandi skúlastjóra, luttekur hann einsamallur. Er eitt felagslærararáð í kommununi, luttekur bert formaðurin í hesum á skúlanevndarfundum.

Teir nevndu luttaka uttan atkvøðurætt, tó luttaka teir ikki á fundum um setan av størvum ella á øðrum fundum eftir avgerð skúlanevndarinnar.

3. stk. Landsstýrismaðurin kann fyriseta, at onnur umboð fyri lærarar, fyri eitt møguligt næmingaráð, foreldraráð ella onnur kunnu taka lut í skúlanevndarfundum. Viðkomandi luttaka tó ikki í viðgerðini av málum um setan av størvum innan skúlaskapin ella málum viðvíkjandi einstøkum lærarum ella næmingum

4. stk. Skúlanevndin heldur fundir, tá ið formaðurin heldur tað vera neyðugt, ella 2 limir krevja hetta. Fyri at skúlanevndin kann taka avgerðir krevst, at minst helvtin av skúlanevndarlimunum atkvøða fyri. Allar avgerðir verða førdar í gerðabók. Allir limir hava rætt til at krevja sína serstøðu stutt innførda í gerðabókina, og at avrit av henni verður sent til aðrar myndugleikar saman við málinum.

§ 48. Bygdarráðið/byráðið hevur skyldu at syrgja fyri, at íbúgvarnir í kommununi hava møguleika fyri at fáa tað neyðugu undirvísing í fólkaskúlanum, smbr. § 26, og tað skal fáa fígging til vega at tryggja hetta.

2. stk. Tað hevur ábyrgdina av, at tað í kommununi eru nóg nógv høli til tað neyðugu undirvísingina, ella at avtala er gjørd við aðrar kommunur um felags undirvísing.

3. stk. Tað hevur ábyrgdina av raksturinum av skúlunum hjá kommununi.

4. stk. Tað ger uppskot til bygging av nýggjum skúlum og víðking og umbygging av verandi skúlum.

5. stk. Tað skal góðkenna uppskot til skúlaætlan kommununnar og broytingar í henni, ið staðfestast av landsstýrismanninum.

6. stk. Tað ásetir nærri reglur um nytsluna av skúlum kommununnar til annað enn undirvísing smb. § 67.

7. stk. Tað gevur ummæli í øllum málum um sín skúlaskap, ið løgd verða fyri tað av landstýrismanninum.

§ 49. Skúlanevndin tekur avgerð um øll viðurskiftir viðvíkjandi kommunala skúlaskapinum, ið ikki eru løgd undir bygdaráðið/byráðið, smbr. § 48, ella aðrar myndugleikar. Hon skal leggja øll mál fyri bygdaráðið/byráðið til góðkenning, um so er, at tey hava við sær fleiri útreiðslur fyri bygdaráðið/byráðið enn ásett í fíggjarætlanini.

Stk. 2 Hon ger uppskot til skúlaætlan fyri kommunu og broytingar í hesari.

Stk. 3 Hon ger uppskot til undirvísingarætlanir og broytingar í hesar fyri skúlarnar í kommununi, ið skulu staðfestast av landsstýrismanninum.

Stk. 4. Hon tekur lut í viðgerðum av byggimálum sambært ásettum reglum hesum viðvíkjandi.

Stk. 5. Hon skal úttala seg um ta árligu fíggjarætlanina fyri skúlaskapin í kommununi.

Stk 6. Hon skal úttala seg um øll viðurskiftir viðvíkjandi skúlanum, sum bygdaráðið/byráðið tekur avgerð um.

Stk.7 Hon hevur rætt til at úttala seg um øll viðurskiftir, sum viðvíkja skúlunum í kommununi. Hon gevur ummæli í øllum málum, ið løgd verða fyri hana av bygdaráðnum/byráðnum ella landsstýrismanninum.

§ 50. Skúlanevndin gevur tilmæli um setan og loysan

úr starvi av leiðarum og lærarum innan skúlaskapin.
2. stk. Hon setir vikarar og faklærarar eftir nærri av landsstýrismannin um ásettum reglum.

§ 51. Skúlanevndin hevur eftirlit við teimum einstøku skúlunum

2. stk. Hon hevur eftirlit við, at teir næmingar, ið ganga í skúlunum í kommununi fylgja nóg væl við undirvísingini. Hon hevur eisini eftirlit við, at næmingar í undirvísingarskyldugum aldri, ið verða undirvísnir privat, fáa nóg góða undirvísing. Hetta eftirlit fellur burtur, um so er, at næmingurin fær undirvísing í einum góðkendum privatum skúla, ið hevur valt sín egna eftirlitsmann.

3. stk. Hon tekur avgerð um flyting av einum næmingi til annan skúla eftir tilmæli frá leiðarunum á teimum báðum skúlunum, ið frammanundan skulu ráðføra seg við lærararáðini og foreldrini hjá næmingunum.

§ 52. Skúlanevndin góðkennir aftaná tilmæli frá leiðarunum og aftaná samráð við lærararáðið býtið av arbeiðinum millum lærararnar og arbeiðsætlanina fyri vikuna.

2. stk. Hon góðkennir eftir tilmæli frá lærararáðnum, hvørji undirvísingaramboð skúlin skal nyta, heruppí hvørji undirvísingaramboð skulu vera í skúlabókasavninum. Kirkjuráðið skal tó góðkenna undirvísingaramboð og -bøkur í fakinum kristnikunnleiki og átrúnaði.

3. stk. Hon ger atferðarreglur fyri skúlarnar í kommununi.

4. stk. Hon skal í samarbeiði við lærararáðið virka fyri samarbeiði millum skúla og heim og syrgja fyri upplýsingararbeiði millum foreldur næminganna, ið hevur til endamáls at fáa tey at skilja støðu næmingsins í skúlanum. Hon skal í minsta lagi halda tveir fundir um árið við ávikavist lærararáðið og bygdaráð/byráð, har skúlaspurningar verða viðgjørdir. Foreldrafundur verður hildin í minsta lagi eina ferð um árið.

§ 53. Søknarpresturin ella ein annar av hispinum góðkendur prestur í kommununi hevur rætt til at vera hjástaddur, meðan undirvíst verður í kristnikunnleika og átrúnaði.

§ 54. Á hvørjum sjálvstøðugum skúla við fleiri lærarum í føstum starvi skal setast ein leiðari.

2. stk. Leiðarin av einum fólkaskúla verður nevndur fyrstilærari ella skúlastjóri.

3. stk. Leiðarin hevur bæði ta fyrisitingarligu og ta undirvísingarligu leiðsluna av virkseminum í viðkomandi skúla.

§ 55. Hava tvær ella fleiri kommunur tikið seg saman í eitt skúlasamband eftir reglunum í § 31, tekur skúlasambandsstýrið sær av uppgávunum hjá kommununum eftir hesi lóg og skúlanevndin fyri skúlasambandið sær av uppgávunum hjá skúlanevndunum.

§ 56. Til hvønn skúla, sum í minsta lagi hevur 20 næmingar og 2 lærarar, verður stovnað eitt námsfrøðiligt ráð at ráðgeva skúlaleiðaranum. Limir í ráðnum eru øll tey samstarvsfólk, ið hava undirvísingarligar og aðrar námsfrøðiligar uppgávur í skúlanum.

Stk. 2. Til hvønn skúla, ið hevur 5. ella eldri flokkstig, stovna næmingarnir eitt næmingaráð.

Stk. 3. Landsstýrismaðurin ger reglur eftir 1. og 2. stk.

4) Í § 67, stk. 7, verður 1. pkt. strikað

5) § 67, stk. 8, verður strikað

6) Í øllum teim førum har skúlastýri ella felagsskúlastýri ella bendingar av hesum orðið eru nevnd, verða tey broytt til skúlanevnd ella bendingar av hesum orði.

§ 2

Lógin kemur í gildi 1. august 1998

Viðmerkingar

Fyri sløkum ári síðani varð nýggj fólkaskúlalóg samtykt av tinginum. Undir viðgerðini av hesum máli vísti Tjóðveldisflokkurin m.a. á, at uppskotið, ið landsstýrið legði fyri tingið, var so at siga beinleiðis umsett úr teirri donsku lógini, og lítið og einki var hugt at øðrum tilsvarandi lógum í øðrum londum, ið kundu verið hóskiligari til okkara skúla.

Sum nevnt, í flestu førum er beinleiðis umsett úr teirri donsku lógini, tó verður nakrar táar ferðir vikið frá. Eitt av frávikunum, har danska orðingin ikki verður fylgd, er hetta "et samfund med frihed og folkestyre", har vit nyta orðingina eitt "fólkaræðisligt samfelag".

Orðið frælsi fær ikki innivist í endamálsgrein føroyska fólkaskúlans, hóast tað eru liðin 20 ár síðani skúlin varð yvirtikin.

Annað frávik er í somu grein, nevnliga § 2, stk. 3, har danska lógin sigur (umsett til føroyskt): Hann skal við støði í danskari mentan menna kunnleika næmingarnna um danska mentan..... Har sigur føroyska lógin: Hann skal við støði í heimligari mentan.....Hví verður vikið frá her, verður einki sagt um.

Tjóðveldisflokkurin heldur, at í hesum báðum førum átti at verið umsett beinleiðis, so at í staðin fyri orðið danskt, átti orðið føroyskt at komið í staðin heldur enn orðið heimligt.

Nógv hevur verið kjakast um, nær farið skal verða undir at veita frálæru í donskum í fólkaskúlanum. Ráðleggingarnevndin, ið hevur gjørt álitið um nýggja fólkaskúlalóg, hevur somuleiðis viðgjørt henda spurning. Meirlutin 4 av 7, mælir til, at frálæra í donskum byrjar ikki fyrrenn í 4. flokki heldur enn í 3. flokki, sum nú er. Minnilutin í nevndini mælir til, at bilddið verður fram við frálærumi frá 3. flokki.

Fyri mongum tykist tað løgið, at landsstýrimaðurin í skúlamálum ikki fylgir meirlutanum í ráðleggingarnevndini, men heldur vetur at fylgja minnilutanum.

Í hesum sambandi skal verða vist á, at kanningar eru gjørdar í Føroyum, ið vísa á, at næmingar, ið byrja undirvísingina í donskum í 4. flokki, eru eins dugnaligir, ja, mangan dugnaligari enn næmingar, ið byrjaðu í 3. flokki, tá ið teir eru komnir í 6. ella 7. flokk.

Undir 1. viðgerð av hesum uppskoti ætlar uppskotsstillarin at gera meira burtur úr hesum kanningum, so allir tingmenn verða kunnaðir um hesi áhugaverdu úrslit.

Tjóðveldisflokkurin mælir til at broyta fólkaskúlalógina soleiðis, at fólkaskúlanæmingar byrja frálæru í donskum í 4. flokki í staðin fyri, sum nú er, í 3. flokki, samstundis sum lærugreinin føroyskt verður styrkt samsvarandi í føroyskum í 3. flokki.

Tá ið fólkaskúlalógin varð viðgjørd í seinasta tingsetu, vórðu einstakar broytingar gjørdar við uppskoti landsstýrisins av løgtinginum, sum eftir Tjóðveldisfloksins uppfatan var til tað verra. M.a. samtykti løgtingið eftir uppskoti meirlutans í Mentanarnevndini, at partur av skúlanevndarlimunum í landinum skulu verða valdir av kommununum. Hetta ber í sær, at í fleiri førum fær kommunustýrið ávirkan í tveimum førum, fyrst í skúlanevndini, síðani tá ið málið skal viðgerast av kommunustýrinum. Hetta, heldur Tjóðveldisflokkurin, er ein óheppin gongd og mælir tí til í hesum uppskoti at fremja broytingar í fólkaskúlalógini, ið bera í sær, at hetta verður tikið úr lógini, og at skúlanevndirnar verða valdar, eins og tær vóru, áðrenn nýggja fólkaskúlalógin varð samtykt.

1. viðgerð hósdagin 12. mars 1998. Uppskotið varð beint í mentanarnevndina.

Málið fall burtur sbr. stýrisskipanarlógini § 15 stk. 3, tí at løgtingsval var 30. apríl 1998, og málið ikki var liðugt viðgjørt á tingi fyri valið.

162 Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um vinnuligan fiskiskap

Ár 1998, hósdagin 5. mars, legði Henrik Old, løgtingsmaður, vegna seg sjálvan fram soljóðandi

U p p s k o t

til

løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um vinnuligan fiskiskap

§ 1

Í løgtingslóg nr. 28 frá 10. mars 1994 um vinnuligan fiskiskap, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 133 frá 9. august 1997, verða gjørdar hesar broytingar:

1) Í § 27 verður sett aftanfyri 1998 "við undantaki, sum er ásett í § 29, stk. 1, bólkur 5.
2) Í § 29, stk. 1, verður Bólkur 5 orðaður soleiðis: "Útróðrarbátar undir 15 BRT á húkaveiðu 15750 fiskidagar í tíðarskeiðnum 1. september 1997 til 30 apríl 1998. Restina av fiskiárinum fiska bátarnir frítt"

§ 2

Henda lóg kemur í gildi dagin eftir, hon er kunngjørd.

Viðmerkingar

Ætlanin við hesum uppskoti er at láta smærru bátarnar fáa høvi at royna allar møguleikar, ið eru til staðar, ta tíðina av árinum, har veður og vindur eru til vildar.

Sum skipanin er nú, so halda menn seg aftur við at brúka fiskidagar teir dagar, tá vánirnar ikki eru til staðar at gera ein góðan dag. Hetta ger, at væl meira verður roynt eftir toski, enn um bátarnir fingu høvi at royna allar møguleikar, t.d. eftir upsa við snellu, sum kann vera ein ágvoligur skiftandi fiskiskapur. Harumframt kundi verðið roynt við línu eftir hvftingi og á djúpum vatni eftir brosmu og longu, umframt kalvalínu sjálvandi.

Teir, sum nú standa aftan fyri landsstýrismeirlutan, áttu at vitað, at fleiri møguleikarnir eru, minni verður goldið út í inntøkutrygd.

Ein bátur kann, um tað fellur á gott veður, fáa einar 18-20 dagar pr. mánað í mai - juni, har fleiri styttri fiskidagar eru ímillum, men hetta kann samanlagt blíva ein góður mánaður. Her er talan um 1/3 av árinum, og kann sostatt 1/3 av døgunum verða drigin frá fyri hesa tíðina. Síðani eigur møguleiki at vera fyri at geva undatak fyri hesum frádrátti til bátar, sum leggja størri dent á línuróður um veturin.

Málið fall burtur sbr. stýrisskipanarlógini § 15 stk. 3, tí at løgtingsval var 30. apríl 1998, og málið ikki var liðugt viðgjørt á tingi fyri valið.

163 Uppskot til samtyktar um góðkenning av avtalu frá 10. juni 1998 millum Ríkisstjórn Danmarkar og Føroya Landsstýri

Ár 1998, 16. juni, legði Anfinn Kallsberg, løgmaður, vegna landsstýrið fram soljóðandi:

Uppskot
til
samtyktar

Sbr. stýrisskipanarlógini § 51 jbr. § 52 stk. 2 góðkennir løgtingið avtalu landsstýrisins frá 10. juni 1998 við ríkisstjórnina

Viðmerkingar

Ríkisstjórnin og landsstýrið samdust hin 10. juni 1998 um eina avtalu, sum høvuðsheitum setir fastar karmar um føroyska búskapin tey næstu árini. Sambært avtaluni eru ríkisstjórnin og landsstýrið vorðin samd um bankamálið og afturgjald av skuld landsstýrisins til ríkisstjórnina, soleiðis, at 900 milliónir krónur verða

strikaðar av skuld landsstýrisins, samstundis sum 500 milliónir krónur verða treytaðar til afturgjaldingar innan 20 ár. Restskuldin verður goldin við 323 milliónum krónum í 20 ár. Harumframt fær landsstýrið ræði á Fíggingargrunninum frá 1992 og Framtaksgrunninum, umframt at Realurin verður yvirtikin. Allar avtalur, ið gjørdar eru síðani 1992, undantikin undirgrundaravtalan, fara úr gildi. Harumframt váttar ríkisstjórnin, at hon eftir ynski frá landsstýrinum er sinnað til at fara undir samráðingar við landsstýrið um føroyskt fullveldi. Landsstýrið var undan samráðingunum av tí áskoðan, at best var at loysa bankamálið og skuldaspurningin undir einum til tess at røkka einari so nøktandi semju sum gjørligt fyri Føroya land. Í hesum sambandi hevur tað verið greitt frá danskari síðu, at ríkisstjórnin neyvan fór at tola ella góðtaka eina loysn á bankamálinum, sum í endurgjaldsstødd var størri enn tað, hon í einum rættarmáli kundi fáa endurgoldið frá Den Danske Bank. Tískil var gjørt av at samansjóða bankamálið og skuldaspurningin.

Ein annar spurningur, ið eisini lá frammalaga í sambandi við samráðingarnar við ríkisstjórnina, var at samføra hana um, hvussu stóran avdrátt føroyski búskapurin í mesta lagi fór at tola í sambandi við afturgjalding av skuldini. Tað eydnaðist at samføra ríkisstjórnina um, at rentur og avdráttir í mesta lagi kundu verða umleið 300 milliónir krónur árliga. Eisini eydnaðist tað at samføra ríkisstjórnina um, at afturgjaldstíðin ikki kundi verða longri enn 20 ár. Avtalan var gjørd við omanfyristandandi sum grundarlagi, og fevnir umars í høvuðsheitum um niðanfyrinevndu mál.

Búskaparligar avleiðingar

Landsstýrið metir tað at vera av stórum týdningi, at rentustigið verður lagt fast á einum lágum støði. Hetta ger tað lættari at leggja eina langtíðar fíggjarpolitikk. Ótryggleikin, ið stendst av einari møguligari rentuhækking, er burtur. Eisini metir landsstýrið, at tað er ein fyrimunur at lánið verður skipað sum eitt annuitetslán, tí at árliga afturgjaldingin kemur ikki at tyngja so nógv fyrstu árini.

Tær 900 milliónir krónurnar, ið eru strikaðar av skuldini, verða inntøkuførdar sum óvanligar inntøkur.

Tær 500 milliónir krónurnar fara ikki at ávirka rentubyrðuna frameftir.

Landskassans roknskapur fyri 1998 verður annars ávirkaður á tann hátt, at rentuútreiðslurnar uppá 438 milliónir krónur minka niður í 323 milliónir krónur. Av hesum stava 84 milliónir krónur frá avtaluni og 30 milliónir krónur frá broyttum fortreytum á fíggjarlógini, t.d. at landskassin hevur niðurgoldið skuld meira enn væntað.

Eingin avdráttur verður goldin í 1998. Í 1999 verður avdrátturin 122 milliónir krónur og rentan 201 million krónur, ella tilsamans 323 milliónir krónur.

Gjørd verður ein eykafíggjarlóg, ið leggur upp fyri hesum viðurskiftum.

Heildarveitingin

Ásetanin av heildarveitingini er gjørd við støði í uppriti, sum ein føroyskur/danskur embætismannabólkur gjørdi síðst í 1997 til at nýta í politiskum samráðingum um at áseta heildarveitingina eftir 1998. Upprunaliga ætlanin var, at henda samráðing skuldi vera í februar mánaði í ár, men orsakað av bæði fólkatingsvali og løgtingsvali hava hesar samráðingar ikki verið fyrr enn nú. Av praktiskum orsøkum, og av tí at fíggjarlógirnar fyri 1999 í báðum londunum skulu gerast, var náttúrligt at taka heildarveitingina við í hesar samráðingarnar.

Grunnar o.a.

Samtíðis avtaluni, skal ríkisstjórnin í hesum árinum taka seg burtur úr Fíggingargrunninum frá 1992 og Framtaksgrunninum. Hetta merkir, at hereftir verður tað landsstýrið, sum velur allar limirnar í nevndirnar fyri grunnarnar, og góðkenningarheimildin hjá ríkisstjórnini av ávísum í viðtøkunum nærri tilskilaðum avgerðum, viðtøkubroytingum v.m., verður uvtikin. Viðtøkurnar verða broyttar samsvarandi avtaluni.

Lán frá ríkisstjórnini uppá 99 milliónir krónur til Fiskiveiðasjóðin verða

konverterað til innskotspening. Eginognin hjá Fiskiveiðasjóðinum, áðrenn

konvertering av skuld, er umleið 4 milliónir krónur.

Avtalan um Fiskiveiðasjóðin og Fiskiveiðasjóðin krevur ikki lógarbroytingar og hevur ongar eykaútreiðslur við sær fyri landskassan.

Realiseringin verður yvirtikin. Í hesum sambandi skal nevnast, at veðhaldini hjá ríkiskassanum halda áfram til tey ganga út.

Ábyrgdin fyri búskaparpolitikkinum
Sambært avtaluni eru ríkisstjórnin og landsstýrið samd um, at landsstýrið nú, innan kunningar av heimastýrislógini, hevur ábyrgdina fyri búskaparpolitikkinum í Føroyum, og at allar avmarkingar í heimildini hjá landsstýrinum at lána og veðhalda eru burtur.

Í roynd og veru merkir hetta, at føroyingar nú sjálvir hava tikið fíggjarligu ábyrgdina av at reka samfelagið Føroyar.

At føroyingar nú hava tikið fíggjarliga ábyrgd fyri hesum landi setir eisini størri og nýggj krøv til føroyskan búskaparpolitikk, tí ein avleiðing av hesum er, at lánitreytirnar hjá landskassanum framyvir verða settar eftir førda búskaparpolitikkinum.

Havandi í huga, at tað, ið fiskivinnan kann geva av sær, er altavgerandi fyri føroyskan búskap, fer landsstýrið at vísa størsta varsemi í fiskivinnu- og búskaparpolitikki frameftir.

Fyrt hevur verið fram, at ríkisstjórnin og landsstýrið ikki kunnu gera eina avtalu um, at landsstýrið hevur ábyrgdina av búskaparpolitikkinum í Føroyum, tí hetta gongur ímóti heimastýrislógini.

Til hetta er at siga, at avtalan beinleiðis staðfestir, at ábyrgdin fyri búskaparpolitikkinum hjá landsstýrinum er innan fyri karmarnar av heimastýrislógini.

Hjáløgd er avtalan frá 10. juni 1998 millum ríkisstjórnina og landsstýrið

AFTALE MELLEM DEN DANSKE REGERING OG FÆRØERNES LANDSSTYRE
Den Danske Regering og Færøernes Landsstyre,

som er besluttet på at fremme et nyt grundlag for det bilaterale samvirke og på baggrund heraf er indstillet på at indlede forhandlinger, på Landsstyreets foranledning, om de fremtidige bilaterale relationer,

som har det formål, at Færøernes Landsstyres gæld til Den Danske Stat omlægges og saneres under hensyntagen til, at gældsafviklingen står i rimeligt forhold til den færøske økonomis bæredygtighed,

som bekræfter, at der i gennem denne aftale er opnået forlig mellem Den Danske Regering og Færøernes Landsstyre i den færøske banksag,

er enige om følgende:

Artikel 1

Den færøske banksag.

Den Danske Regering og Færøernes Landsstyre har taget konklusionerne vedrørende aktiebyttet mellem Den Danske Bank og Finansieringsfonden af 1992 i beretningen afgivet af undersøgelseskommissionen vedrørende den færøske banksag til efterretning.

Landsstyret har ved tidligere forhandlinger med Regeringen gjort gældende, at Færøerne ved rekapitaliseringen af bankerne er kommet til at bære en uforholdsmæssig stor del af disse omkostninger.

I betragtning af, at det af beretningen fremgår, at Regeringens og Landsstyrets samtykke til aktiebyttet mellem Den Danske Bank og Finansieringsfonden af 1992 har været baseret på urigtige forudsætninger, er der enighed om, at med denne aftale kompenseres Færøerne herfor.

I anledning heraf frafalder Landsstyret at gøre eventuelle retskrav mod Den Danske Stat hidrørende fra den færøske banksag gældende over for Staten og hæver den af Landsstyret mod Den Danske Stat anlagte retssag. Den Danske Stat betaler Landsstyrets samlede omkostninger i forbindelse med denne retssag, herunder den indbetalte retsafgift.

Såfremt der ikke mellem parterne kan opnås enighed om størrelsen af omkostningerne, overlades det til Østre Landsret (med sædvanlig adgang til at søge landsrettens afgørelse indbragt for Højesteret) at træffe bestemmelse om sagsomkostninger efter sædvanlige principper.

Landsstyret viderefører den af Landsstyret anlagte retssag mod Den Danske Bank og tiltræder herved, at den i artikel 2 aftalte gældsnedskrivning reduceres med det nettobeløb, som Landsstyret eventuelt som et resultat af retssagen måtte blive tilkendt af Den Danske Bank. Dette beløb indbetales som et ekstraordinært afdrag til staten. Staten afholder alle udgifter ved videreførelsen af denne sag, herunder de sagsomkostninger, som Landsstyret eventuelt måtte blive pålagt at betale i tilfælde af frifindelse af Den Danske Bank.

I betragtning af at Den Danske Stat, som følge af denne aftale har den økonomiske interesse i videreførelsen af retssagen mod Den Danske Bank, bemyndiger Landsstyret Regeringen til at forhandle med Den Danske Bank om en eventuel forligsmæssig afslutning af sagen og at indgå aftale på Landsstyrets vegne herom.

Landsstyret er indforstået med, at Den Danske Stat kan indgå en separat aftale med Finansieringsfonden af 1992 om fondens videreførelse af sit sagsanlæg mod Den Danske Bank, herunder om transport til Staten af det beløb, som banken måtte blive pålagt at betale til fonden.

Artikel 2

Færøernes Landsstyres gæld til Den Danske Stat.

Den Danske Regering og Færøernes Landsstyre er enige om, at Landsstyrets gæld til Den Danske Stat og gældsafviklingen må stå i et rimeligt forhold til den færøske økonomis bæredygtighed. Når henses hertil, samt den kompensation som tilkommer Landsstyret i banksagen, nedskrives Landsstyrets gæld til Staten med 900 mio. kr.

Af restgælden henstår 500 mio. kr. som et rente- og afdragsfrit lån. Afviklingen heraf aftales i takt med eventuelle indtægter fra fremtidig råstofudvinding. Dog afskrives gælden efter 20 år, såfremt der ikke på det tidspunkt er startet udvinding af råstoffer.

Den resterende gæld afvikles som et 20-årigt annuitetslån på 4023 mio. kr. til en fast årlig rente på 5 pct. Annuiteten fastsættes til 323 mio. kr. årligt. Landsstyret har ret til førtidig indfrielse af restgælden helt eller delvis.

Artikel 3

Bloktilskuddet

Den Danske Regering og Færøernes Landsstyre er enige om, at Den Danske Stat yder et årligt bloktilskud til Færøernes finanslov på 932 mio. kr. for årene 1999, 2000 og 2001 ændret på 1999-niveauet realt. Det bemærkes, at spørgsmålet om blokstilskuddet tages op til revision i forbindelse med kommende forhandlinger om en nyordning af forholdet mellem Danmark og Færøerne.

Artikel 4

Finansieringsfonden af 1992

Den Danske Regering og Færøernes Landsstyre er enige om, at Den Danske Stat afvikler sit engagement i Finansieringsfonden af 1992 inden udgangen af 1998. Finansieringsfondens vedtægter ændres i overensstemmelse hermed. Finansieringsfonden undergives det almindelige fondstilsyn.

Artikel 5

Færøernes Erhvervsudviklingsinstitut

Den Danske Regering og Færøernes Landsstyre er enige om, at Den Danske Stat afvikler sit engagement i Færøernes Erhvervsudviklingsinstitut inden udgangen af 1998. Statens lån til Erhvervsudviklingsinstituttet, som er et 10 årigt rente- og afdragsfrit lån og som pr. 1. juni 1998 udgør 99 mio. kr., konverteres forud herfor til indskudskapital. Erhvervsudviklingsinstituttets vedtægter ændres i overensstemmelse hermed. Erhvervsudviklingsinstituttet undergives det almindelige fondstilsyn.

Artikel 6

Færøernes Realkreditinstitut

Den Danske Regering og Færøernes Landsstyre er enige om, at Færøernes Realkreditinstitut overtages af Landsstyret som færøsk særanliggende. Regeringen er indforstået med, at de statslige garantier, som allerede eksisterer i Realkreditinstituttet, bibeholdes til deres automatiske udløb. Landsstyret vil fremsætte forslag til lagtingslov i overensstemmelse hermed. Folketingets repræsentation i Realkreditinstituttets repræsentantskab bortfalder, når de eksisterende statsgaranterede obligationslån udløber.

Artikel 7

Kreditinstitutter m.v.

Den Danske Regering og Færøernes Landsstyre er enige om, at spørgsmålet om tilsynet med færøske kreditinstitutter vil indgå i de kommende forhandlinger om en nyordning af forholdet mellem Danmark og Færøerne. Den Kongelige Bankkommissær (økonomiministeren) vil underrette om og drøfte udviklingen i den finanselle sektor og de finansielle markeder med den repræsentant for Landsstyret, der omtales i lov om pengesedler m.v. på Færøerne. Den Kongelige Bankkommissær og Danmarks Nationalbank vil endvidere løbende underrette Landsstyret om den penge- og valutamæssige udvikling.

Artikel 8

Ansvaret for den økonomiske politik

Den Danske Regering og Færøernes Landsstyre er enige om, at ansvaret for den økonomiske politik på Færøerne, herunder for fremtidig låneoptagelse og garantistillelser, indenfor de rammer som følger af hjemmestyreloven, ligger hos Landsstyret. Herved er samtlige begrænsninger i Landsstyrets låneoptagelser og garantistillelser bortfaldet.

Artikel 9

Fremtidige bilaterale relationer mellem Danmark og Færøerne

2 Føreren af ethvert fiskeskib skal sørge for, at brovagten er fyldestgørende tilrettelagt med henblik på opretholdelse af en sikker vagt. Under førerens almindelige ledelse er de vagthavende navigatører ansvarlige for fiskeskibets sikre navigering på deres vagter. De skal herunder især søge at undgå kollision og grundstødning.

3 De grundlæggende principper, der omfatter, men ikke er begrænset til nedenstående, skal iagttages i alle fiskeskibe. En deltager må dog fritage meget små fiskeskibe, der opererer i nærfart fra fuldt ud at opfylde disse grundlæggende principper.

4 På rejse til eller fra fiskeplads

4.1 Tilrettelæggelse af brovagten

4.1.1 Vagtens sammensætning skal til enhver tid være hensigtsmæssig og i overensstemmelse med de foreliggende omstændigheder og forhold samt tage hensyn til nødvendigheden af at holde behørig udkig

4.1.2 Ved beslutning om sammensætning af brovagten skal bl.a. følgende faktorer tages i betragtning:

.1 styrehuset må på intet tidspunkt være ubemandet,

.2 vejrforhold, sigtbarhed og om det er dagslys eller mørke,

.3 nærliggende farer for sejladsen, som kan gøre det nødvendigt for den vagthavende navigatør at udføre:

supplerende arbejde med navigeringen,
.4 anvendelse og driftstilstand af navigationshjælpemidler, såsom radar og elektronisk positionsbestemmelsesudstyr og ethvert andet udstyr, der vedrører skibets sikre navigering,
.5 om skibet er udstyret med selvstyrer, og .6 usædvanlige krav, som kan opstå på vagten som følge af særlige driftsforhold.

4.2 Egnethed til tjeneste

Vagtsystemet skal være således tilrettelagt, at vagthavende personels effektivitet ikke er nedsat på grund af træt- hed. Tjenesten skal være således tilrettelagt, at det første vagthold ved rejsens begyndelse og de efterfølgende afløser vagthold har fået tilstrækkelig hvile og i øvrigt er egnede til at gå på vagt.

4.3 Sejlads

4.3.1 Den forestående rejse skal i videst muligt omfang planlægges på forhånd under hensyntagen til alle relevante oplysninger, og enhver udsat kurs skal kontrolleres før rejsens begyndelse.

4.3.2 På vagten skal den styrede kurs, position og fart kontrolleres med tilstrækkeligt hyppige mellemrum ved brug af alle til rådighed værende navigationshjælpemidler, som er nødvendige for at sikre, at skibet følger den planlagte kurs.

4.3.3 Den vagthavende navigatør skal have nøje kendskab til placeringen og betjeningen af alt sikkerheds- og navigationsudstyr om bord i skibet og skal være bekendt med og tage hensyn til sådant udstyrs begrænsninger under brug.

4.3.4 Den vagthavende navigatør må ikke sættes til eller påtage sig noget arbejde, som vil kunne gribe forstyrrende ind i skibets sikre navigering.

4.4 Navigationsudstyr

4.4.1 Den vagthavende navigatør skal anvende alt til rådighed værende navigationsudstyr så effektivt som muligt.

4.4.2 Ved brug af radar skal den vagthavende navigatør erindre sig nødvendigheden af til enhver tid at følge bestemmelserne om brug af radar i de pågældende regler i søvejsreglerne.

4.4.3 Når forholdene gør den nødvendigt, må den vagthavende navigatør ikke tøve med at bruge ror, maskine samt lyd- og lyssignalapparater.

4.5 Pligter og ansvar

4.5.1 Den vagthavende navigatør skal:
.1 holde vagt i styrehuset,
.2 under ingen omstændigheder forlade styrehuset uden at være behørigt afløst,
.3 vedblivende være ansvarlig for skibets sikre navigering uanset førerens tilstedeværelse på broen, indtil det udtrykkeligt tilkendegives vedkommende, at føreren har overtaget dette ansvar, og begge har forstået dette,
.4 varsko føreren, hvis der er den mindste tvivl om hvilke forholdsregler, der skal træffes af hensyn til sikkerheden, og
.5 ikke overdrage vagten til den afløsende navigatør, hvis der er grund til at tro, at denne ikke er i stand til udføre sin vagttjeneste på forsvarlig vis, og i så tilfælde varsko føreren herom.

4.5.2 Ved overtagelse af vagten skal den afløsende navigatør bekræfte og forvisse sig om skibets gissede eller observerede position og kontrollere den tilsigtede rute, kurs og fart samt notere sig eventuelle farer for sejladsen, som kan forventes mødt under vagten.

4.5.3 Når det er praktisk muligt, skal der gøres fornødne optegnelser om alt forefaldende på vagten vedrørende skibets navigering og sejlads.

4.6 Udkig

4.6.1 Behørig udkig skal opretholdes i overensstemmelse med regel 5 i de internationale søvejsregler, 1972. Udkigstjenesten skal tjene følgende formål:

.1 opretholdelse af en vedvarende årvågenhedstilstand ved hjælp af syn og hørelse samt ved alle andre til rådighed stående midler med hensyn til enhver betydende ændring i de foreliggende omgivelser.

.2 fuldstændig vurdering af situationen og af faren for kollision og grundstødning samt andre farer for sejladsen, og

.3 opdagelse af nødstedte skibe og luftfartøjer, skibbrudne samt vrag og drivgods.

4.6.2 Ved afgørelsen af, om sammensætningen af brovagten er tilstrækkelig til at sikre opretholdelse af behørig udkig, skal føreren tage hensyn til alle relevante faktorer, herunder dem, der er beskrevet i punkt 4.1 i dette reglement, så vel som til følgende faktorer:

.1 sigtbarhed, vejrforhold og sø,

.2 trafiktætheden samt andre aktiviteter, der finder sted i det område, hvor skibet sejler,

.3 den agtpågivenhed, der er nødvendig ved sejlads i eller nær trafikadskillelsessystemer og andre sejladsreguleringer,

.4 den yderligere arbejdsbyrde, der følger af karakteren af skibets funktioner, umiddelbare driftsforhold og forudsete manøvrer,

.5 ror- og maskinkontrol (propellerkontrol?) samt skibets manøvreegenskaber,

.6 egnetheden til tjeneste for alle besætningsmedlemmer, der er stand by med henblik på at kunne tilkaldes til af vagtholdet,

.7 kendskab og tiltro til skibets navigatørers og meniges professionelle kvalifikationer,

.8 den vagthavende navigatørs erfaring og dennes kendskab til skibets udstyr, procedurer og manøvreringsevne,

.9 aktiviteter, der til enhver tid finder sted om bord på skibet, og mulighed for om fornødent at tilkalde øjeblikkelig assistance til styrehuset,

.10 driftstilstand af instrumenter i styrehuset samt kontroludstyr, herunder alarmsystemer,

.11 skibets størrelse og synsfeltet fra manøvrepladsen,

.12 styrehusets opbygning og indretning i det omfang denne kan forhindre en person fra vagtholdet i at opdage eksterne udviklinger ved hjælp af syn eller hørelse, og

.13 alle relevante normer, procedurer og retningslinier i forbindelse med vagtordninger og egnethed til tjeneste, som er vedtaget af organisationen.

4.7 Beskyttelse af havmiljøet

Føreren og den vagthavende navigatør skal være opmærksomme på de alvorlige følger af forurening af havmiljøet som følge af driftsmæssig eller hændelig forurening og skal træffe alle mulige sikkerhedsforanstaltninger for at forhindre sådan forurening, navnlig inden for rammerne af relevante bestemmelser i internationale regler og i havnereglementer.

4.8 Vejrforhold

Den vagthavende navigatør skal træffe alle relevante foranstaltninger og underrette føreren, når ændringer i vejrforholdene kan have betydning for skibets sikkerhed, herunder forhold, der kan medføre overisning.

5 Sejlads med lods om bord

Tilstedeværelsen af lods om bord fritager ikke føreren eller vagthavende navigatør for deres pligter og ansvar med hensyn til skibets sikkerhed. Føreren og lodsen skal udveksle oplysninger om sejladsens tilrettelæggelse, lokale forhold og skibets karakteristika. Føreren og den vagthavende navigatør skal samarbejde snævert med lodsen og føre nøje kontrol med skibets position og sejlads.

6 Skibe, der er i færd med at fiske eller søge efter fisk

6.1 Udover de principper, der er opregnet under punkt 4, skal følgende faktorer tages i betragtning og danne grundlag for vagthavende navigatørs initiativer:

.1 andre skibe, der fisker, og deres grej, eget skibs manøvreegenskaber, herunder især dets stoppedistance og drejediameter ved almindelig fart og med fiskegrej udsat,

.2 sikkerheden for den del af besætningen, som er på dæk,

.3 ugunstig indflydelse på skib og besætnings sikkerhed ved reduktion af stabilitet og fribord forårsaget af usædvanlige kræfter fra fiskeredskaber, håndtering og stuvning af fangst og af vanskelige sø- og vejrforhold,

.4 afstanden til offshoreanlæg, med særligt hensyn til sikkerhedszoner, og

.5 vrag og andre undervandshindringer, som kan udgøre en fare for fiskeredskaber.

6.2 Under stuvning af fangst skal der udvises særlig omhu med hensyn til at sikre tilstrækkeligt fribord, tilstrækkelig stabilitet og vandtæthed på ethvert tidspunkt af hjemrejsen under hensyntagen til bunkers- og storesforbrug, risiko for vanskelige vejrforhold, samt, især om vinteren, risiko for overisning på eller over udsatte dæk i områder, hvor overisning kan forekomme.

7 Ankervagt

Føreren skal drage omsorg for, at der af hensyn til skibets og besætningens sikkerhed til enhver tid opretholdes en behørig vagt fra styrehus eller dæk, når fiskeskibe ligger for anker.

8 Radiovagt

Under hensyntagen til kravene i radioreglementet skal føreren sikre, at der, når skibet er i søen, opretholdes behørig radiovagt på relevante frekvenser.

1. viðgerð málsins 22. juni 1998. Uppskotið vísað beint í vinnunevndina, sum tann 24. juni 1998 legði fram soljóðandi:

Álit

Málið er lagt fram av landsstýrinum tann 18. juni 1998 og er eftir 1. viðgerð tann 22. juni 1998 beint í vinnunevndina.

Vinnunevndin hevur viðgjørt málið.

Ein meiriluti í nevndini, Heini O. Heinesen, Jógvan á Lakjuni, Jákup Suni Joensen og Jákup Sverri Kass mælir løgtinginum til at góðkenna uppskotið.

Ein minniluti, Henrik Old og Alfred Olsen, tekur ikki undir við uppskotinum at seta sáttmálan í gildi fyrr enn londini uttanum okkum, og serliga Noreg, setur sáttmálan í gildi. Fyrr enn Noreg setur sáttmálan í gildi, er vandi fyri ólíkum krøvum har og í Føroyum.

2. viðgerð fríggjadagin 26. juni 1998. Uppskotið til samtykkt samtykt 13-0-8.

F.L.Jnr. 1620-12/98

165 Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um sjómenn

Ár 1998, 18. juni, legði John Petersen, landsstýrismaður, vegna landsstýrið fram soljóðandi:

Uppskot
til
løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um sjómenn.

§ 1.

Í løgtingslóg nr. 4 frá 15. januar 1988 um sjómenn, sum broytt við løgtingslóg nr. 117 frá 21. mai 1993 verða gjørdar hesar broytingar:

1) § 55, stk. 1 verður orðað soleiðis:

"Sjómaður skal hava neyðuga tíð til hvíld og svøvn. Fyri hvørt samdøgur skal hvíldartíðin vera í minsta lagi 10 tímar. Hvíldartíðin kann býtast upp í 2 tíðarbil, har annað skal vera í minsta lagi 6 tímar. Víkjast kann frá hesum ásetingum í neyðstøðu, í sambandi við venjingar og tá ið trygd skipsins annars krevur tað."

2) Í § 55 verður eftir stk. 1 sett sum nýtt stk. 2:

"*Stk. 2.* Uttan mun til ásetingarnar í stk. 1 kann hvíldartíðin setast niður í 6 tímar um samdøgurið í eitt tíðarskeið uppá tveir fylgjandi dagar. Treytin fyri hesum er tó, at í minsta lagi 70 tíma hvíld fæst í eitt tíðarskeið upp á 7 samdøgur." Stk. 2 4 verða hereftir stk. 3-5.

§ 2.

Henda lóg kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd. Samstundis verður danski teksturin í lógini strikaður.

Viðmerkingar.

Ein av broytingunum í STCW 78 sáttmálanum í 1995 vóru reglurnar um hvíldartíð hjá sjófólki.

Reglurnar um hvíldartíð eru skrivaðar í kapittul 6 í løgtingslóg nr. 4 frá 15. januar 1988 um sjómenn við seinni broytingum.

Broytingin hevur ongar fíggjarligar ella umsitingarligar avleiðingar.

Til 1). STCW-sáttmálin fyri handilsskip ásetur, at hvíldartíðin skal vera minst 10 tímar fyri hvørt samdøgur. Hvíldartíðin kann deilast upp í 2 tíðarbil, harav tann eina skal vera minst 6 tímar samanhangandi.

Víkjast kann frá hesum ásetingum í neyðstøðum, í samband við venjingar og tá ið trygd skipsins annars krevur tað.

Til 2). Hvíldartíðin kann setast niður í 6 tímar um samdøgurið í eitt tíðarskeið uppá tveir fylgjandi dagar. Treytin fyri hesum er tó, at í minsta lagi 70 tíma hvíld fæst í eitt tíðarskeið upp á 7 samdøgur.

Broytingarnar eru bert galdandi fyri handilsskip. Fyri fiskiskip galda verandi reglur í § 55, stk. 2, sum nú verður § 55, stk. 3.

1. viðgerð 22. juni 1998. Uppskotið varð beint í vinnunevndina, sum tann 2-1. juni 1998 legði fram soljóðandi:

Álit

Málið er lagt fram av landsstýrinum tann 18. juni 1998 og er eftir 1. viðgerð tann 22. juni 1998 beint í vinnunevndina.

Vinnunevndin hevur viðgjørt málið, og mælir ein samd nevnd løgtingimum til at góðkenna uppskotið.

2. viðgerð fríggjadagin 26. juni 1998. §§ 1 og 2 samtykkur 22-0-0. At málið soleiðis samtykt kann fara til 3. viðgerð, samtykt 22-0-0.

3. viðgerð 30. juni 1998. Uppskotið, sum samtykt við 2. viðgerð, endaliga samtykt 25-1-0.

Løgtingslóg nr. 62 frá 03.07.1998.

166 Uppskot til løgtingslóg um manning av skipum

Ár 1998, 18. juni, legði John Petersen, landsstýrismaður, vegna landsstýrið fram soljóðandi:

Uppskot
til
løgtingslóg um manning av skipum

Kapittul 1

§ 1. Lógin fevnir um skip undir føroyskum flaggi.

§ 2. Í hesari lóg merkir:

1) »Sjóvinnufyrisitingin«: Myndugleikin í hesi lóg, sum fyrisitingarliga er skipaður undir landsstýrismanninum í sjóvinnumálum.
2) »Fiskiskip«: Eitt og hvørt skip ella far, sum verður nýtt til vinnuligan fiskiskap og hevur veiðuloyvi frá Fiskimálastýrinum.
3) »Handilsskip«: Eitt og hvørt skip, tá ið fiskiskip og stuttleikafør eru undantikin.
4) »Ferðamannaskip«: Handilsskip, sum flytur meira enn 12 ferðafólk.
5) »Farmaskip«: Handilsskip, sum ikki eru ferðamannaskip.
6) »Stuttleikafar«: Skip, sum ikki verður nýtt til vinnuligt endamál. Er ivamál, avgerð Sjóvinnufyrisitingin, um eitt skip skal metast sum stuttleikafar.
7) »Havskip«: Skip, sum er í sigling uttanfyri havnir, fjør, innsjógvar ella vatnøki.
8) »STCW-áteking«: Sjóvinnubrævi ella viðurkenningarváttan, sum verður útskrivað samsvarandi ásetingum í millumlanda sáttmálanum um útbúgving av sjófólki, um sjóvinnu og um vaktarhald á skipum frá 1978 við seinni broytingum (STCW-sáttmálin).
9) »STCW-F-áteking«: Sjóvinnubrævi ella viðurkenningarváttan, sum verður útskrivað samsvarandi ásetingum í millumlanda sáttmálanum um manning við fiskiskipum frá 1995 (STCW-F-sáttmálin).
10) »Bruttotons«: Bruttotonsatal (BT), sum til eina og hvørja tíð er tilskilað í skipsins málibrævi, tuen soleiðis at brotin tøl falla burtur, um nøkur eru.
11) »Longd«: Longd á skipi mátað sambært lóg um uppmáting av skipum og sum hon er ásett í metrum í málibrævi skipsins.
12) »Framleikumegi«: Øll tann samanlagda megin í kilowatt (kW), men soleiðis at brotin tøl falla burtur, um nøkur eru, við støðugga gongd á øllum maskinum, sum samstarvdis kunnu driva skipið fram. Orkan verður ásett grundað á reyndartalatalvuna hjá motorverksmiðjuni, og verður hon at seta í siglingarloyvisbrævið og manningarskjalið.
13) »Strandasigling«: Sigling, meðan fráleikin er ikki meira enn 30 fjórðingar frá beinum grundlinjum drignar gjøgnum 12 stað sum tilskilað í løgtingslóg um vinnuligan fiskiskap.
14) »Heimasigling«: Sigling, meðan fráleikin er ikki meiri enn 200 fjórðingar frá beinum grundlinjum drignar gjøgnum 12 stað sum tilskilað í løgtingslóg um vinnuligan fiskiskap.
15) »Altjóða sigling«: Sigling uttanfyri strandasigling og heimasigling.
16) »Góðkend«: Góðkend sambært løgtingslóg um sjómansútbúgvingar ella onnur útbúgving, sum er góðkend av Undirvísingar- og mentamálastýrinum.

§ 3. Á øllum skipum skal vera skipari og harafturat so mikil manning, sum tørvur er á til at tryggja mannalív á sjónum.

Kapittul 2

Fiskiskip og handilsskip

§ 4. Fyri ferðamannaskip, uttan mun til støddd og sigliøki, fyri fiskiskip og farmaskip yvir 20 bruttotons uttan mun til sigliøki og fyri fiskiskip og farmaskip minni enn 20 bruttotons uttanfyri strandasigling, setir Sjóvinnufyrisitingin manningina. Fyri fiskiskip og farmaskip minni enn 20 bruttotons í strandasigling, kann Sjóvinnufyrisitingin áseta manningina, um mett verður, at atlitið til trygdina fyri mannalívum á sjónum ger hetta neyðugt.

Stk. 2. Manningarásetingin verður skrivað á skjal, sum Sjóvinnufyrisitingin gevur út. Hetta skjal skal altíð vera umborð á skipinum.

Stk. 3. Fyri skip til støddar minni enn 20 bruttotons í strandasigling kann manningin verða ásett fyri bólkar av skipum og í staðin fyri at skriva prógv, sum tilskilað í stk. 2, kann verða fráboðað um ásetingina við kunngerð.

Stk. 4. Manningin verður ásett fyri hvørt skipið sær við atliti til slag av skipi, innretting, útbúnað, nýtslu og siglingarleið, so at manningin er slík til nøgd og samanseting, at alt arbeiði fæst gjørt, sum hevur týdning fyri tryggleikan hjá skipi og teimum, sum eru umborð, eitt nú:

1) at halda dygga brúgva- og maskinvakt,
2) at nýta og umsita bjargingarumboð,
3) at nýta og umsita útgerð til sjóskaðaumsitingar, eldsløkkingar og sanoskiftingar,
4) at halda við lív og halda reint tað, sum aðramáta viðvíkir tryggleikanum,
5) at leggja skipið fyri teym ella við bryggju,
6) at matgera og hava heilsuatstøður í lagi.

Stk. 5. Við áseting av manningini skal afturat atlit verða havt til vaktarskipanina umborð, til líðarbeiði, til verulign arbeiðstíðina hjá teimum einstøku starvsbólkunum, til galdandi reglur um hvíldartíð og til eindarmanningarskipan.

§ 5. Skiparar, brúgva- og maskinyvirmenn skulu hava sjóvinnubrøv sambært niðanfyristandandi talvum. Frumritið skal vera umborð.

SKIPARAR OG STÝRIMENN

TALVA 1. Handilsskip undir 500 bruttotons í strandasigling

Bruttotons	Skipari	Stýrimaður
20-99	Heimaskipari við handilsskipum	Dugnaskaparkrav í sigling við handilsskipum (STCW-regl. II/4 as Watchkeeping Officer)
100-499	(STCW regl. II/3 as Master)	Stýrimaður á 4. stigi við handilsskipum (STCW-regl. II/3 as Watchkeeping Officer)

TALVA 2. Onnur handilsskip uttan mun tit sigliøki

Bruttotons	Skipari	Yvirstýrimaður	Aðrir stýrimenn
20-2999	Skipari við handilsskipum (STCW-regl. II/2 as Master)	Stýrimaður á 3. stigi við handilsskipum (STCW-regl. II/2 as Chief Mate)	Stýrimaður á 3.stigi við handilsskipum
3000-	Skipsførari (STCW-regl. II/2 as Master)	Stýrimaður á 1. stigi (STCW-regl. II/2 as Chief Mate)	(STCW-regl. II/2as Watchkeeping Officer)

TALVA 3. Fiskiskip í strandasigling

Bruttotons	Skipari	Yfirstýrimaður	Aðrir stýrimenn
20-99	Dugnaskaparbréf í sigling við fiskiskipum	Dugnaskaparbréf í sigling við fiskiskipum	
100-799	Heimaskipari við fiskiskipum	Stýrimaður á 4. stigi við fiskiskipum	
800-	Skipari við fiskiskipum	Stýrimaður á 3. stigi við fiskiskipum	Stýrimaður á 4. stigi við fiskiskipum

TALVA 4. Fiskiskip í heimasigling

Bruttotons	Skipari	Yfirstýrimaður	Aðrir stýrimenn
20-99	Heimaskipari við fiskiskipum	Dugnaskaparbréf í sigling við fiskiskipum	
100-799	Heimaskipari við fiskiskipum	Stýrimaður á 4. stigi við fiskiskipum	
800-	Skipari við fiskiskipum	Stýrimaður á 3. stigi við fiskiskipum	Stýrimaður á 4. stigi við fiskiskipum

TALVA 5. Fiskiskip í altjóða sigling

Bruttotons	Skipari	Yfirstýrimaður	Aðrir stýrimenn
20-99	Heimaskipari við fiskiskipum	Stýrimaður á 4. stigi við fiskiskipum	
100-799	Skipari við fiskiskipum	Stýrimaður á 3. stigi við fiskiskipum	
800-	Skipari við fiskiskipum	Stýrimaður á 3. stigi við fiskiskipum	Stýrimaður á 3.stigi við fiskiskipum

MASKINYVIRMENN

TALVA 6. Handilsskip í altjóða sigling

Framleiðsluorka (kW)	Maskinstjóri/ Einumaskinmeistari	1. maskinmeistari	Aðrir maskinmeistarar
100-449	Dugnaskaparbrøv í motorpassing		
100-749	Motorpasari		
750-2999	Skipsmaskinistur á 1. stigi (STCW-regl. III/3 as Chief Engineer	Skipsmaskinistur á 2. stigi (STCW-regl. III/2 as 2nd Engineer	Skipsmaskinistur á 2. stigi ella vakthavandi maskinyvirmaður
3000-	Skipsmaskinstjóri (STCW-regl. III/2 as Chief Engineer)	Skipsmaskinmeistari á 1. stigi (STCW-regl. III/2 as 2nd Engineer)	(STCW-regl. III/1 as Watchkeeping Officer

TALVA 7. Handilsskip í strandasigling og heimasigling

Framleiðsluorka (kW)	Maskinstjóri/ Einumaskinmeistari	1. maskinmeistari	Aðrir maskinmeistarar
100-449	Dugnaskaparbrøv í motorpassing		
450-749	Motorpasari		
750-1499	Skipsmaskinistur á 2. stigi	Skipsmaskinistur á 2. stigi	
1500-2999	Skipsmaskinistur á 1. stigi (STCW-regl. III/3 as Chief Engineer	Skipsmaskinistur á 2. stigi (STCW regl. III/3 as 2nd Engineer	Skipsmaskinistur 2. stigi ella vaktlavandi maskinyvirmaður
3000	Skipsmaskinstjóri (STCW regl. III/2 as Chief Engineer)	Skipsmaskinmeistari á 1. stigi (STCW regl. III/2 as 2nd Engineer)	(STCW regl. III/1 Watchkeeping Officer)

TALVA 8. Fiskiskip í altjóða sigling

Framdrivsorka (kW)	Maskinsjefur/ Undirmaskinmeistari	Undirmaskinmeistari	Aðrir maskinmeistarar
001-449	Dugnaskaparbrævi í motorpassing		
450-749	Motorpassari		
750-2999	Skipsmaskinistur á 1. stigi	Skipsmaskinistur á 2. stigi	Skipsmaskinistur á 2. stigi ella vaktbarandi
3000	Skipsmaskinsjóri	Skipsmaskinmeistari á 1. stigi	maskinsvirmaður

TALVA 9. Fiskiskip í strandasigling og heimasigling

Framdrivsorka (kW)	Maskinsjefur/ Undirmaskinmeistari	Undirmaskinmeistari	Aðrir maskinmeistarar
100-449	Dugnaskaparbrævi í motorpassing		
450-749	Motorpassari		
750-1499	Skipsmaskinistur á 2. stigi	Skipsmaskinistur á 2. stigi	
1500-2999	Skipsmaskinistur á 1. stigi	Skipsmaskinistur á 2. stigi	Skipsmaskinistur á 2. stigi ella vaktbarandi
3000-	Skipsmaskinsjóri	Skipsmaskinmeistari á 1. stigi	maskinsvirmaður

Stk. 2. Persónur við dugnaskaparbrævi í motorpassing, sum verður krevdur, kann um sumar tíð verða skipaður í annað starv umborð.

Stk. 3. Sjóvinnufyrisitingin kann økja ella minka um tey farteikakrøv, sum stk. 1 og § 11, stk. 1 og 2, setir við atliti til innretting, útbúnað, siglingaleið og ferðamannatal umborð á skipum.

Stk. 4. Á skipum skrásettum í Føroysku Altjóða Skipaskránni (FAS), verða ikki krevd føroysk sjóvinnubrøv, men gild sjóvinnubrøv við STCW áteking frá Sjóvinnufyrisitingini samsvarandi ásetingunum í 1. stk. Skipari skal tó hava heimarett.

Stk. 5. Landsstýrismaðurin í sjóvinnumálum kann áseta, at brúgvavyvirmenn og maskinyvirmenn við fiskiskipum skulu hava sjóvinnubrøv við STCW-F-áteking.

§ 6. Radiopassarar á skipum, sum sambært galdandi fyriskipanum skulu hava radiotelefonútgerð til nýtslu í altjóða maritimu trygdarskipanini (GMDSS), skulu hava føroysk vinnubrøv sum skipsradiopassarar við STCW-áteking.

Stk. 2. Á skipum skrásettum í Føroysku Altjóða Skipaskránni (FAS), verða ikki krevd føroysk sjóvinnubrøv, men gild sjóvinnubrøv við STCW-áteking frá Sjóvinnufyrisitingini til tænastu sum skipsradiopassarar.

§ 7. Á fórum, har manningin er størri enn 8, men ikki størri enn 20, skal vera kokkur, og á fórum, har manningin er størri enn 20, skal vera kokkur og á fórum, har manningin er størri enn 40, skulu vera tveir kokkar. Í hesum tølum er kokkur ikki taldur. Á ferðamannaskipum kann Sjóvinnufyrisitingin fyriseta størri tal av kokkum.

Stk. 2. Fyriskipaður kokkur ella hovmeistari skal hava vinnubrævi sum skipskokkur.

Stk. 3. Á skipum, skrásettum í Føroysku Altjóða Skipaskránni (FAS), verður loyvt at vera í starvi sum skipskokkur uttan sjóvinnubrævi, um avvarðandi hevur havt lærutíð tilsamans 48 mánaðir í kokkayrkinum, av hesum í minsta lagi 24 mánaðir á havskipum.

Kapittul 3

Stuttleikafør

§ 8. Á stuttleikaførum, ið stoddar 20 bruttotons og størri, men minni enn 100 bruttotons skal vera skipari og stýrimaður við sjóvinnubrævi til fiskiskip ella handilsskip samsvarandi niðanfyrisandandi talvu:

Siglingarøki	**Skipari**	**Stýrimaður**
Strandasigling	Dugnaskaparbrævi í sigling	Dugnaskaparbrævi í sigling
Uttanfyri strandasigling	Heimaskipari	Dugnaskaparbrævi í sigling

Stk. 2. Fyri stuttleikafør til støddar 100 bruttotons og størri ásetir Sjóvinnufyrisitingin manningina.
Stk. 3. Til at passa maskinuna á stuttleikaførum til støddar 20 bruttotons og størri við framtøkumaskinu til støddar 100 kW og størri, men minni enn 750 kW, skal, tá ið maskinan kann verða stillað og skrúvustýring fara fratn frá róðurplássinum, í strandasigling, verða 1 persónur við dugnaskaparbravi í motorpassing. Fyri onnur stuttleikafør til støddar 20 bruttotons og størri við framtøkumaskinu til støddar 100 kW og størri ásetir Sjóvinnufyrisitingin maskinmanningina.
Stk. 4. Tá ið Sjóvinnufyrisitingin sambært stk. 2 og 3 ásetir manningina, skal verða gingið eftir § 4, stk. 4.
Stk. 5. Sjóvinnufyrisitingin kann áseta førleikakrøv til skiparar á stuttleikaførum til støddar minni enn 20 bruttotons og krøv til maskinmanning á slíkum førum.

Kapittul 4
Førleikakrøv

§ 9. Eingin má verða settur til sjálvstøðuga vakt umborð sum stýrimaður ella maskinmeistari, uttan at hava sjóvinnubræv, sum í minsta lagi lýkur treytirnar fyri setta lægsta starv sum ávikavist stýrimaður ella maskinmeistari.

§ 10. Landsstýrismaðurin í sjóvinnumálum ásetir, ansandi bindandi altjóða sáttmálum og í samráð við umboð fyri reiðara- og sjómannafeløgini førleikakrøv til
1) dekks-, maskin og cindarmanning,
2) sjúkraviðgerðara umborð
3) manningar umborð á ferðamannaskipum og
4) yvirmenn og manning umborð á olju-, kemikaliu- og gasstangaskipum.

Stk. 2. Sjóvinnufyrisitingin kann haraftrat áseta serlig førleikakrøv, herundir økja ella minka um tógarinnar førleikakrøv og manningarreglur fyri
1) persónar, sum eru í starvi, har lógin ikki setir serlig førleikakrøv, og
2) yvirmenn og manning umborð á
a) skipum við serstakum stýriegioleikum,
b) skip við serstakari innrætting og serstakari útgerð,
c) serskip og skip við serstakum byggihátti,
d) skip, sum verða nýtt á landafrøðiliga avmarkaðum siglingarleiðum

Stk. 3. Tá ið Sjóvinnufyrisitingin sambært stk. 2 ásetur manningina, skal verða gingið eftir § 4, stk. 4.

Kapittul 5
Sjóvinnubrøv

§ 11. Landsstýrismaðurin í sjóvinnumálum ásetir, ansandi bindandi altjóða sáttmálum og í samráð við umboð fyri reiðara- og sjómannafeløgini, treytirnar fyri at fáa tey í hesi lóg nevndu sjóvinnubrøv, herundir krøv um
1) førleika,
2) siglingartíð,
3) heilsustøðu
4) sjónar- og hoyrnarevni
5) aldur og
6) at viðkomandi er myndugur og ikki undir verjumáli.

Stk. 2. Til at fáa sjóvinnubræv við førararættindum verður kravt, at viðkomandi hevur danskan heimarætt. Landsstýrismaðurin í sjóvinnumálum kann, eftir tilmæli frá reiðara- og sjómannafeløgunum, í serligum førum víkja frá kravinum um heimarætt.

§ 12. Sjóvinnubrøv verða útgivin ókeypis.
Stk. 2. Sjóvinnubrøv verða útgivin av Sjóvinnufyrisitingini.
Stk. 3. Sjóvinnubrøv eru í gildi í 5 ár frá útgevingardegnum. Landsstýrismaðurin í sjóvinnumálum ásetir treytir fyri endurnýggjan av sjóvinnubrøvum, um endurvinning av sjóvinnubrævarættindum og um útgevan av fyrsta sjóvinnubrævinum til persónar, sum hava staðið til sjóvinnubrævið kravdu útbúgving meira enn 5 ár frammanundan útgevingardagin.
Stk. 4. Sjóvinnufyrisitingin ásetur, ansandi bindandi altjóða samtyktum, reglur fyri áteking av útlendsk um sjóvinnubrøvum og góðkenning av útlendskum prógvum.

§ 13. Landsstýrismaðurin í sjóvinnumálum kann taka aftur sjóvinnubræv, um so er, at viðkomandi, sum brævið hevur, við sigling sínari ella í aðrari tænasta umborð hevur verið beinleiðis hóttan móti tívi, ogn ella umhvørvi ella um tað vegna sálarligu ella likamuligu støðuna verður mett óráð at lata viðkomandi virka framhaldandi í tí starvi, sum sjóvinnubrævið gevur rætt til.
Stk. 2. Tann, ið hevur fingið sjóvinnubræv, skal geva seg undir slíkar læknakanningar, sum eru neyðugar, tá ið avgerð skal verða tikin um teir spurningar, sum nevndir eru í stk. 1. Útreiðslurnar í sambond við slíkar kanningar rindar landskassin. Sleppur tann persónur, sum vinnubrævið hevur, sær undan áðgeðum kannitgum, kann sjóvinnubrævið verða aftantikið.

§ 14. Tann persónur, sum avgerðin viðvíkur, kann krevja, at afturtøka sjóvinnubrævsins verður løgd fyri dómstólarnar. Áheitan um hetta skal vera sett fram fyri landsstýrismanninum í sjóvinnumálum, áðrenn 4 vikur eru gingnar eftir, at avgerðin er fráboðað avvarðandi.

Stk. 2. Í avgerð landsstýrismansins í sjóvinnumálum skal vera skilað til um rættin til at krevja dómstóla roynd og fleistirnar í hesum sambandi.

Stk. 3. Tá ið afturtøka av sjóvinnubrøvum verður kravd løgd fyri dómstólarnar, byrjar landsstýrismaðurin í sjóvinnumálum rættarmál í móti avvarðandi sambært reglunum um borgarliga rættargongu. Málið er sjórættarmál.

Stk. 4. Áheitan um at leggja málið fyri rættin, fortir við sær, at afturtøkan av sjóvinnubrævinum steðgar. Landsstýrismaðurin í sjóvinnumálum kann tó áseta, at áheitan um at leggja málið fyri rættin ikki ger steðg í afturtøkini. Henda avgerð landsstýrismansins í sjóvinnumálum kann tó verða sett úr gildi við rættarúrskurði, og tað aðrenn avgerð verður tikin um, hvørt tøkan var løglig.

§ 15. Sjóvinnubrøv, sum er afturtikið, verður latið Sjóvinnufyrisitingini.

Stk. 2. Landsstýrismaðurin í sjóvinnumálum kann til eina og hvørja tíð geva tikið sjóvinnubrøv aftur, tá umstøðurnar, sum vóru orsøk til afturtøkuna, ikki longur vera fyrihildnar at vera til staðar. Verður umsókn um at fáa brævið aftur noktað, kann umsøkjarin krevja spurningin lagdan fyri dómstólarnar. Um málið áður hevur verið lagt fyri dómstólarnar, kann hetta tó ikki verða fyrr enn í minsta lagi 1 ár eftir, at frátøkan seinast var staðfest við dómi. § 14, stk. 2 og 3 verða nýtt tilsvarandi.

§ 16. Tann rættur til at føra skip, sum fylgir við vinnubrøvum fellur burtur, tá ið tann, sum hevur brævið, missir danskan heimarætt. Landsstýrismaðurin í sjóvinnumálum kann tó, tá ið serliga ber til, veita undantøk frá hesari reglu. Fær avvarðandi aftur danskan heimarætt, skal rætturin at føra skip samsvarandi verða roknaður sum afturfingin, smb. tó § 12, stk. 3.

Kapittul 6

Reiðarans og skiparans ábyrgd

§ 17. Reiðarin og skiparin skulu tryggja sær:

1) at øll starvsett sjófólk, lúka tey til starvið kravdu útbúgvingar-, førleika- og vinnubrævakrøv, og at tey kravdu prógv eru umborð í frumriti,
2) at dagfort yvirlit er til skjals yvir øll starvsett sjófólk, teirra starv umborð, teirra heilsustøðu og haraftrat skjalprógv fyri teirra førleikum,
3) at øll nýmynstraði sjófólk, áðrenn skipstænastan byrjar, fáa neyðuga frágreiðing um teirra arbeiði umborð, herundir um útgerð, innleggingar og neyðskipanir og haraftrat um serstakar fyriskipanir, sum hava týdning fyri bæði teirra vanaarbeiði umborð og teirra uppgávur í eini neyðstøðu,
4) at skipsmanningin til líttar kann samskipa uppgávurnar í neyðstøðum og í førum, tá vandi er fyri dálking, og
5) at manningin kann samskifta sínámillum um trygdarmál og skilja trygdarboð, herundir skelti, tekin og ávaringartekin.

Stk. 2. Landsstýrismaðurin í sjóvinnumálum kann gera nærri reglur um tær ásetingar, ið nevndar eru í stk. 1 og har áseta serlig samskiftis- og málkrøv.

Kapittul 7

Vanligar fyriskipanir

§ 18. Ein og hvør, sum verður settur í starv umborð, sum hendi lýt fevnir um, skal lúka tey førleikakrøv, sum lógin ásetur.

Stk. 2. Stýrimaður ella maskinmeistari, sum settur verður út um áseta talið, skal ikki verða havdur til sjálvstøðuga vakt uttan so, at hann hevur sjóvinnubrev í minsta lagi á sama stigi, sum kravt er fyri starv sum lægsti stýrimaður ella lægsti maskinmeistari á skipinum.

Stk. 3. Landsstýrismaðurin í sjóvinnumálum kann áseta nærri reglur um vaktarhald á skipum.

§ 19. Missir skip nakað av fyriskipaðu manning síni av sjúku, deyða, rýming ella aðrari orsøk, sum skiparin ella reiðarí hava ikki ábyrgd av, tá skulu krøv áseld í ella sambært hesi lóg ikki forða, at skiparin við umhugsni um sjódyggleika skipsins heldur fram ferðina. Manningin skal tó skjótast til hær fáast upp á fult tal aftur. Skiparin skal føra inn frágreiðing um hesi viðurskifti í skipsdagbókina, ella um skipsdagbók verður ikki førd, í eftirlitsbókina.

§ 20. Landsstýrismaðurin í sjóvinnumálum kann, eftir samráð við reiðara- og sjómannafelagini, broyta tey í hesi lóg ásettu tonsamørk til onnur mørk, sum sett eru í aðrari málíeind og broyta tey í hesi lóg ásettu mørk fyri framtøkumegi.

§ 21. Sjóvinnufyrisitingin kann, umsandi bindandi af-

tjóða samtyktum og § 4, stk. 4, í serligum førum og í avmarkaðum tíðarskeiði økja ella minka um manningartalið sambært manningarskjalinum.

Stk. 2. Sjóvinnufyrisitingin kann í serligum førum og ansandi bindandi altjóða samtyktum, loyva, at persónur verður havdur í starvi, tó at hann hevur ikki slíkt vinnubræv, sum krevst í starvinum, men ber fyri einstaka ferð ella ávíst tíðarbil, sum ikki skal vera longri enn 6 mánaðir.

Undanáseting

§ 22. Sjóvinnufyrisitingin ásetir eftir áheitan manningina fyri skip, sum byggjætlan er gjørd fyri, fyri skip, sum skal umbyggjast, og fyri útlendskt skip, sum ætlanin er at føra undir føroyskt flagg (undanáseting).

Stk. 2. Metir Sjóvinnufyrisitingin, at ein undanáseting fæst ikki gjørd á nóg tryggan hátt, verður áheitanin víst aftur við neyðugari grundgeving.

Stk. 3. Ein undanáseting - møguliga broytt við kæru til sjóvinnuráðið - er bindandi, uttan so at broyting hevur verið í teimum fyritreytum, sum hava verið avgerðandi fyri áselingina.

Sjóvinnuráðið

§ 23. Avgerðir, sum Sjóvinnufyrisitingin hevur tikið sambært § 4, stk. 3, 4 og 5, § 5, stk. 3, § 8, stk. 2, 3 og 5, § 10, stk. 2, § 21, stk. 1 og 2 og § 22, stk. 1 kunnu avvarðandi reiðari ella sjómannafeløg leggja fyri sjóvinnuráðið, sum tekur ta endaligu fyrisitingarligu avgerðina.

Stk. 2. Avgerð, har áheitan um undanáseting ikki er gingin á møti, kann tó ikki verða løgd fyri ráðið.

Stk. 3. Er undanásetingin ikki, áðrenn ein mánaður er gingin, løgd fyri ráðið, kann avgerð um endaligu manningarásetingina samsvarandi undanásetingini ikki verða løgd fyri ráðið, uttan broytingar hava verið í teimum fyritreytum, sum vóru avgerandi fyri ásetingina.

Stk. 4. Í Sjóvinnuráðnum situr formaður, sum skal vera løgfrøðingur, ið landsstýrismaðurin í sjóvinnumálum tilnevnir, og eitt umboð fyri hvørt av sjómannafeløgunum, eins nógv umboð fyri reiðarafeløgini, allir tilnevndir av landsstýrismanninum í sjóvinnumálum eftir tilmæli frá avvarðandi feløgum. Fyri hvønn lim verður tilnevndur ein eykalimur.

Stk. 5. Landsstýrismaðurin í sjóvinnumálum ásetir reglur um málsviðgerðina í nevndini.

Revsifyriskipan

§ 24. Við sekt verður hann revsaður, sum brýtur § 3, § 4, stk. 2, § 5, stk. 1 ella 6, § 6, § 7, § 8, stk. 1 ella 3, § 9, § 17, nr. 1 ella 2 og § 19, nr. 2 ella 3, ella brýtur tær manningarásetingar, sum eru gjørdar sambært hesari lóg.

Stk. 2. Í fyriskipanum, sum ásettar verða sambært hesi lóg, kann sektarrevsing verða ásett fyri brot á reglurnar í ásetingunum smb. tó § 25, stk. 4.

§ 25. Við sekt, hefti ella fongsli í upp til 1 ár verður tann revsaður, ið brýtur § 17, stk. 1, nr 3, 4 ella 5.

Stk. 2. Revsingin kann økjast til hefti ella fongsul í upp til 2 ár, um brotið er gjørt við vilja ella orsakað av grovum ósketni og um tað í samband við brotið er

1) hendur skaði á ungfólk undir 18 ár, ella vandi hevur verið fyri tí, ella
2) fingin fíggjarligur vinningur, fróknaðar sparing ar til viðkomandi sjálvan ella onnur, ella hetta hevur verið ætlanin.

Stk. 3. Verður ikki hald lagt á vinning, ið fingin er í samband við brotið, skal serligt atlit havast til støddina á tí fingna ella ætlaða vinninginum, tá ið sektin verður ásett, smb. stk. 2, nr. 2.

Stk. 4. Í áselingum, ið verða gjørdar sambært § 17, stk. 2 viðvíkjandi § 17, stk. 1, nr 3-5, kann sum revsing ásetast bót, hefti ella fongsul í upp til 1 ár. Eisini kann ásetast, at revsingin kann vaksa til hefti ella fongsul í upp til 2 ár, um viðurskiftini líkjast teimum, ið nevnd eru í stk. 2.

§ 26. Fyri brot, sum verða framd av partafeløgum, lutafeløgum og slíkum felagsskapum, kann sektin verða áløgd felagnum sum slíkum. Er brotið framt av einari kommunu ella á líkan hátt av kommunalum felagsskapi, sum fevndur er av løgtingslóg um føroysku kommunurnar, kann sekt verða løgd á kommunur ella kommunala felagsskapin.

Kapittul 8.

Gildiskomst og umskiftisásetingar

§ 27. Henda lóg kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

Stk. 2. Samstundis fer løgtingslóg nr. 5 frá 15. januar 1988 um manning av skipum við seinni broytingum og løgtingslóg nr. 16 frá 3. mars 1988 um sjóvinnu við seinni broytingum úr gildi.

Stk. 3. Tær ásetingar, sum eru gjørdar sambært tær í stk. 2 nevndu lógum, vera framvegis í gildi, til ásetingar sambært hesi lóg verða settar í gildi ístaðin.

§ 28. Sjóvinnubrøv, útgivin áðrenn lógin fekk gildi, geva ánarum teirra somu rættindi sum teir hevdu

frammanundan. Sjóvinnubrøv, sum geva rættindi til tænastu sum dekksyvirmaður, maskinyvirmaður ella radiopassari við handilsskipum eru tó bert gild til tann 1. februar 2002.

Stk. 2. Fyri skip, ið eru minni enn 24 m til longdar, og sum bert eru uppmáld sambært áður galdandi málireglum, verður tað á skipsins málibrævi ásetta bruttoregistartonsatal (BRT), rundað niðureftir uttan brotatøl, nýtt í staðin fyri tað í hesi lóg ásetta bruttotonsatal (BT).

§ 29. Skip, sum eru í sigling tann dag lógin fær gildi, og hvørs manning ikki er ásett í lógini, skal hava manning samsvarandi teimum manningarreglum og manningarásetingum, sum higartil hava verið galdandi, til nýggj manning er ásett.

Stk. 2. Førtir manningarásetingin, sum nevnd er í stk. 1, við sær minni krøv, skal minkingin av manningini teir fyrstu 6 mánaðirnar frá ásetingini bert fara fram við náttúrligari frágongd ella við komu í føroyska havn. Dansk ella Grønlendsk havn verða bert mettar sum føroysk havn um so er, at sjómaðurin hevur bústað í Føroyum ella Grønlandi.

Almennar viðmerkingar

Í juli 1995 bleiv ein sjórnarráðstevna hildin í altjóða havfelagsskapinum IMO (International Maritime Organisation) í London um sjóvinnu-, sjóvinnuútbúgvingar og vaktarhald á skipum. Tafan var um at broyta verandi konvensjón, ella sáttmála, til handilsskip og at gera nýggjan tilsvarandi sáttmála til fiskiskip.

IMO felagsskapurin hevði í mong ár verið undir trýsti frá mongum pørtum fyri ikki at gera eitt nóg gott arbeiði fyri at betra um trygdina á sjónum, nú serliga aftaná tær stóru skipsvanlukkurnar um okkara leiðir tey seinastu árini.

Fleiri teknisk krøv til skip vórðu tó samtykt í 80-unum og fram í 90-ini. Men krøvini til tann menniskjaliga partin høvdu ikki í sama mun fylgt við menningini á økinum. Ein altjóða sáttmáli innan hetta øki var tó gjørdur í 1978 (STCW-78), men var eftir hondini blivin so útvatnaður og veikur, at neyðugt var við munandi broytingum.

Ein annar trupulleiki við sáttmálanum var eisini, at hesin ikki megnaði at byrgja fyri teimum mongu følsku sjóvinnubrøvunum miltum sjófólk, serliga frá menningarfondunum.

Í 1993 samtykti so IMO at fara undir at endurskoða handilsskipasáttmálan. Í sama viðfangi bleiv samtykt, at ein tilsvarandi sáttmáli skuldi gerast til fiskiskip.

Undirnevndirnar í IMO arbeiddu ágvuliga skjótt við hesum og longu 2 ár seinni kundi ein sjórnarráðstevna viðgera broytingaruppskotini og uppskotið til nýggja fiskiskipasáttmálan. Ráðstevnan samtykti bæði uppskotini í juli 1995. Broytingarnar í handilsskipasáttmálanum komu í gildi 1. februar í ár, tó soleiðis at partar av henni hava eina tillagingarfrið uppá 5 ár. Fiskiskipasáttmálin, STCW-F, kemur í gildi altjóða 12 mánaðir eftir, at 15 lond hava tikið undir við honum. Sonuleiðis her eru nakrar skiftisreglir uppá 5 ár eftir, at hesin er komin í gildi í einum limalandi.

Sjóvinnufyrisitingin umboðaði Føroyar saman við Danmark í teimum samráðingum, sum fóru fram í tíðarskeiðnum 1994-95.

Sum fylgja av, at Føroyar hava staðfest handilsskipasáttmálan (í 1990) og sum eina fyrireiking til staðfesting av fiskiskipasáttmálanum, setti landsstýrismaðurin í sjóvinnumálum í januar 1997 ein arbeiðsbólk, við tí endamáli, at koma við uppskotum til neyðugar broytingar í manningar-, sjóvinnu-, sjómans-, og myndingarlógini.

Nevndin skuldi eisini viðgera nýggja fiskiskipasáttmálan og geva landsstýrinum tilmæli um, hvørt tað í manningar- og sjóvinnulógini í stórri mun skuldi skiljast ímillum fiski- og handilsskip, tá hesi skulu uppfylla nevndu sáttmálar.

Nevndin var samansett við umboðum fyri Sjóvinnufyrisitingina, sum hevði formannin, Føroya Skipara- og Navigatørfelagið, Maskinmeistarafelagið, Føroya Reiðarafelag, Reiðarafelagið fyri farmaskip, Fiskimannafelagið og landsstýrið.

Í arbeiðssetninginum hjá nevndini er m.a. ásett, at undir viðgerðini av nýggja fiskiskipasáttmálanum skal nevndin koma við tilmæli um, hvørt tað í manningar- og sjóvinnulógini í størri mun skuldi skiljast ímillum fiski- og handilsskip.

Í uppskotinum til manningarlógina, og tá serliga í uppskotinum til kunngerðina til lógina, verður skilt sundur í ávísan mun í ásetingunum til fiskiskip og handilsskip.

Grundgevingin fyri hesum er fyrst og fremst tann, at tann kravda siglingartíðin ikki er eins og at fiskiskipasáttmálin er linari enn handilsskipasáttmálin. Fyri útgávu av fyrsta sjóvinnuhrævi, sum gevur rættindi við handilsskipum, er galdandi, at hendan skal vera skjalprógvað í einari útbúgvingarbók, t.v.s. at undir fyrireikandi siglingartíðini skal viðkomandi fáa neyðugan førleika til viðkomandi viðurskifti umborð undir eftirliti av einum yvirmanni. Hetta er tó ikki sáttmálakrav fyri teir, sum sigla í 36 mánaðir. Fyri fiskiskip er hinvegin ikki galdandi, at tann kravda siglingartíðin skal vera skjalprógvað í einari útbúgvingarbók.

Av tí, at báðir sáttmálarnir ikki gera mun á maskinfamnastu við handils- ella fiskiskipum, vil nevndin skjóta upp, at útbúgvingarbókin á hesum økinum verður nýtt umborð á báðum skipasløgunum. Maskinmeistarar við føroyskari útbúgving kunnu so uttan trupulleikar fáa rættindi umborð á báðum skipasløgunum.

Útbúgvingin á sjómansskúlunum í Føroyum er soleiðis samansett, at tann ástoðiligi parturin uppfyllir báðar sáttmálarnar til skipara- og skipsføraraútbúgvingina. Tað er, sum nevnt omanfyri, fyrst og fremst tann kravda siglingartíðin, sum munur er á.

Hetta merkir sjálvsagt, at fyri at viðkomandi skal kunna fáa rættindi sum stýrimaður við handils- ella fiskiskipum, skal viðkomandi umframt útbúgvingina eisini lúka treytirnar fyri siglingartíð í ávikavist handils- og fiskiskipum.

Ásetingarnar um kravda siglingartíð broyta hóast alt ikki nógv í verandi skipan. Teir kravdu 6 mánaðirnir við handilsskipum skulu framvegis vera í gildi fyri at fáa rættindi við handilsskipum. Ein partur av kravdu siglingartíðini skal vera fingin við skipum yvir 500 bruttotons í altjóða sigling. Áður var hetta markið 200 bruttoregistartons. Hinvegin er nú krav um, at fyri at fáa rættindi við fiskiskipum, skulu mínst 6 mánaðir siglingartíð vera fingin við fiskiskipum.

Nevndin hevur viðgjørt ásetingarnar í tí nýggja fiskiskipasáttmálan STCW-F. Hesin sáttmáli hevur linari krøv enn handilsskipasáttmálin. Samstundis sum tær føroysku lógirnar í størri mun eru bygdar á handilsskipasáttmálan, og hervið eru ásetingarnar til fiskiskip á sama støði sum til handilsskip, hevur hetta evnið verið eitt afturvendandi umtaluevni á nevndarfundunum. Serliga eru tað manningarfeløgini sum vísa á, at fiskiskipasáttmálin ikki skal vera páskot til at lækka krøvini til fiskiskip. Hinvegin hevur umboðið fyri Føroya Reiðarafelag víst á, at manningarkrøvini til føroysk fiskiskip ikki skulu vera hægri enn ásetingarnar í STCW-F sáttmálanum. Sagt verður, at hetta m.a. er grundað á kappingarføri hjá okkum í mun til grannalond okkara. Í fylgisskjølunum til álitið er eitt samanbering av krøvunum hjá Noregi og Íslandi. Í Noregi eru krøvini linari enn í Føroyum, meðan tey eru strangari í Íslandi.

Tá talan er um kravt tal av manning umborð verður víst til manningarskjalið hjá hvørjum skipi sær, sum er ásett av Sjóvinnufyrisitingini. Manningartalið kann broytast umsitingarliga uttan at hetta grípur inn í ásetingarnar í STCW-F sáttmálanum.

Hinvegin ásetur sáttmálin m.a. førleikakrøv til manning umborð á skipum yvir eina ávísa stødd.

Nevndin er í høvuðsheitum samd um førleikakrøvini, sum ásett eru í talvunum í § 5 í uppskotinum til manningarlógina. Umboðið fyri Føroya Reiðarafelag tekur tó ikki undir við kravinum um, at tað við fiskiskipum, við framtokumegi uppá 3000 kW ella størri, skal vera ásettur ein persónur við sjóvinnubrævi sum skipsmaskinstjóri (3 ára útbúgving). Føroya Reiðarafelag vísir til STCW-F sáttmálan, sum loyvir maskinistum á 1. stigi (1 ára útbúgving) óavmarkaði rættindi við fiskiskipum sum maskinstjórar.

Maskinistar á 2. stigi kunnu, sambært sama sáttmála, vera 1. meistarar á øllum fiskiskipum. Umboðið fyri Maskinmeistarafelagið tekur ikki undir við hesum, vísandi til, at fiskiskip tøkniliga ikki eru verri útgjørd enn handilsskip.

Lógaruppskotið til manningarlógina er gjørt við atliti at ásetingunum í bæði í STCW- og STCW-F-sáttmálunum.

Nevndin hevur ikki viðgjørt spurningin um útbúgvingar, sum annars er ein týðandi partur av báðum sáttmálunum. Hetta økið liggur undir landsstýrismanninum í undirvísingarmálum.

Nevndin mælir til, at sjómansútbúgvingarnar og skeiðvirksemi verða dagførd skjótast gjørligt og í seinasta lagi 1. august 1998, sum er sáttmálakrav.

Í hesum sambandi hevur nevndin viðgjørt spurningin um gjøld í samband við kravd skeið sambært STCW- og STCW-F-sáttmálarnar.

Ein meirluti í nevndini, umboðini fyri reiðara- og sjómannafeløggini mæla til, at hesi skeið vera ókeypis fyri luttakararnar. Talan er t.d. um tað almenna kravið um trygdarskeið og tey skeið, sum skulu takast, fyri at viðkomandi kann varðveita rættindini, tá tey gomlu STCW-78 sjóvinnubrøvini skulu umbýtast til tey nýggju sambært broytingunum í sáttmálanum.

Nevndin ásannar, at tað eru nøkur viðurskifti í sjómans- og mynstringarlógini, umframt altjóða krøvini, sum átta at fingið eina gjølligari viðgerð. M.a. eru tað nakrar kunngerðir til sjómanslógina, sum ongantíð eru gjørdar. Hetta er tó uttanfyri arbeiðssetningin hjá nevndini. Men nevndin mælir landsstýrismanninum í sjóvinnumálum til at seta hetta arbeiðið í gongd.

Fíggjarligar og fyrisitingarligar avleiðingar

Broytingarnar í fyriliggjandi lógum og kunngerðum kunnu fáa nakrar eyka fíggjarligar avleiðingar í inniverandi fíggjarári. Mett er, at kr. 200.000 skulu setast av til útvegan av edv útgerð í sambandi við útgávu av sjóvinnubrøvum í nýggjum sniði og til skráseting av øllum sjóvinnubrovum og prógvum. Hetta er tó treytað av, at tað framvegis verður møguligt at útgeva føroysk sjóvinnubrøv við STCW- og STCW-F-áteking.

Sambært lógaruppskotinum skal sjóvinnumyndugleikin árita útlendsk sjóvinnubrøv, fyri at teir kunnu fáa rættindi til at starvast umborð á føroyskum skipum. Í dag eru fáir útlendingar við føroyskum skipum og kann hetta tí gerast við verandi umsiting.

Gjørt verður vart við, at tað er av alstórum týdningi bæði fyri føroysk handilsskip og fyri sjófólk við sjóvinnubrøvum, sum geva rættindi til handilsskip, at bæði landsstýrismaðurin í sjóvinnumálum og løgtingið tekur hædd fyri broytingunum í handilsskipasáttmálanum STCW longu í hesi tingsetuni. Hetta kann gerast við at samtykkja fyriliggjandi uppskot til nýggja manningarlóg og við at samtykkja broytingina í sjómanslógini.

Niðurstøða

Ein samd nevnd mælir landsstýrismanninum í sjóvinnumálum til at taka undir við tí nýggja altjóða fiskiskipasáttmálanum um útbúgving, sjóvinnu og vaktarhald á fiskiskipum, STCW F 1995 og leggja hann fyri Føroya Løgting til samtyktar. Landsstýrismaðurin tekur undir við hesum og verður hetta lagt fram serskilt.

Nevndin mælir landsstýrismanninum í sjóvinnumálum til at leggja fyriliggjandi uppskot til nýggja manningarlóg og broyting í sjómanslógini fyri Føroya Løgting. Landsstýrismaðurin tekur undir við hesum og verður hetta uppskot fyrilagt løgtinginum. Broytingarnar í sjómanslógini eru serskiltar og fyrilagdar løgtinginum.

Nevndin mælir landsstýrismanninum í sjóvinnumálum til, eftir at nýggja manningarlógin er sett í gildi, at seta í gildi uppskotið til kunngerð um sjóvinnubrøv og førleikakrøv. Hetta verður gjørt eftir gildiskomu lógarinnar og staðfestingini av STCW-F sáttmálanum.

Sum nevnt undir samandráttinum hevur verður skotið upp at samanskriva verandi manningarlóg við partar av verandi sjóvinnulóg. Útyvir broytingar í innihaldinum í lógunum, verður ein stórur partur í verandi sjóvinnulóg sambært uppskotinum ásett í umsitingarligum reglum, t.e. kunngerð frá fiskimálastýrinum. Tann parturin av sjóvinnulógini, sum verður førdur yvir í manningarlógina, er í høvuðsheitum viðvíkjandi mannagongd í samband við afturtøku av sjóvinnubrævi hjá persóni, sum missur rættindi til at hava hetta vegna sálarligu ella likamligu støðuna. Galdandi ásetanin í sjóvinnulógini um afturtøku av sjóvinnubrævi, vegna mistan heimarætt, hjá teimum, sum hava fóraraættindi á føroyskum skipum, er nú skrivað inn í uppskotið til manningarlógina.

Tann parturin av sjóvinnulógini, sum verður førdur yvir í kunngerð, er viðvíkjandi treytum fyri at fáa sjóvinnubrøv, treytir fyri raynstring av dekkarum, motormonnum og skipsatstøðartum, treytir fyri gildi av sjóvinnubrøvum, treytir fyri at fáa sjóvinnubrøv, hóast ásettu krøv ikki eru lokin til fulnar v.m.

Skiftisreglurnar í sjóvinnulógini um rættindi hjá teimum, sum hava eina úbúgving eftir gomlum reglum, eru nú skrivaðar í kunngerðini.

Av tí, at Føroyar ikki eru sjálvstøðugt limaland í IMO, men partur av danska limaskapinum, hevur nevndin mett tað rættast, at fylgja høvuðslinjunum í tí tilsvarandi donsku manningarlógini. Manningarlógin er tó tillagað føroysk viðurskifti har hetta letur seg gera sambært konvensjónsásetingum og hvar hetta ikki ávirkar líkastillingsavtaluna um sjóvinnubrøv millum Føroyar og Danmark.

Mett verður, at tað er rætt at áseta tann partin av verandi sjóvinnulóg, sum viðvíkur førleikakrøvum, treytir fyri útgávu av sjóvinnubrøvum og treytir fyri raynstring í eina kunngerð. Grundgevingin fyri hesum er, at bæði førleikakrøv og treytir fyri raynstringar eru útsettar fyri álvaldandi broytingum sum fylgja av tillagingum frá altjóða konvensjónum og ynskjum frá tí føroysku vinnuni. Við hesum er tað lættari at ganga komandi krøvum og ynskjum á møti.

Altjóða sáttmálin um útbúgvingar, sjóvinnu og vaktarhald á fiskiskipum, STCW-F-sáttmálin, bleiv gjørdur í 1995. Hesin er tó ikki komin í gildi enn altjóða, men uppskotið til manningarlógina inniheldur tær ásetanir, sum konvensjónin hevur. Hesin sáttmálið er eisini lagdur fyri løgtingið til samtyktar.

Viðmerkingar til tær einstøku greinarnar í lógini.

Til § 1

Av tí at tað er møguligt at hava eitt skip dupultskrásett, t.v.s. bæði í Føroyum og í einari útlendskari skipaskrá (bareboat-skráseting) er neyðugt at gera greitt, at lógin bert fevnir um skip undir føroyskum flaggi.

Til § 2

ad 2) Allýsingin av einum fiskiskipi er nú í samsvar við skipaskrásetingarlógina.

ad 6) Í ivamálum um eitt skip skal metast sum stuttleikafar, tekur Sjóvinnufyrisitingin avgerð um hetta eftir tilmæli frá Skipaeftirlitinum.

ad 7) Hinki sjóøki í Føroyum uttanfyri havnir verður roknað sum vart sigliøki eftir hesi lóg. Tá talan er um at onkur hevur upptjent siglingstíð í einum vanlum sjóøki í einum øðrum landi, verður hetta viðgjørt í hvørjum einstøkum føri og í samráð við sjóvinnumyndugleikarnar á staðnum.

ad 8) Allýsingin umfatar tær átekningar á sjóvinnubrøv, sum eru gjørdar samsvarandi tí altjóða STCW-sáttmálanum (Standards of training, Certification and Watchkeeping for Seafarers, 1978 as amended in 1995).

ad 9) Allýsingin er innført fyri, at Føroyar kann staðfesta STCW-F sáttmálan (Standards of Training, Certification and Watchkeeping for Fishing Vessel Personnel, 1995).

ad 10) Allýsingin er gjørd í samsvar við lógina um uppmáting av skipum. Skiftisreglurnar í tí altjóða sáttmálanum um uppmáting av skipum gingu út tann 18. juli 1994.

ad 13) Sigliøkið verður roknað frá grundlinjuni, sum ásett er í lógini um vinnuligan fiskiskap.

ad 14) Sama sum ad. 13.

Til § 3

Áseting er tann sama sum § 3 í galdandi manningarlóg.

Til § 4

ad 1) Áseting er, við onkrari umskriving, samsvarandi § 4, stk. 1 í verandi manningarlóg.

ad 2-3) Áseting er, við onkrari umskriving, samsvarandi § 10 í verandi manningarlóg.

ad 3-4) Áseting er tann sama sum § 4, stk. 2 og 3 í verandi manningarlóg.

Til § 5

ad 1) Framritið av einum sjóvinnubrævi skal altíð vera umborð. Hetta er í samsvar við STCW-sáttmálan. Ásetingarnar í talvunum eru í samsvar við broyttu STCW sáttmálan. Nýtt sjóvinnubrev er komið inn, sum eitur vakthavandi maskinyvirmaður. Maskinstjórin á fiski- og handilsskipum við framtøkumegi millum 750 og 2999 kW í altjóða sigling, skulu hava sjóvinnubrev sum skipsmaskinistur á 1. stigi. Hetta ferðar tó ikki fyri, at teir, sum hava eitt sjóvinnubrev sum skipsmaskinistur á 2. stigi og hava maskinistroyndina, at virka sum skipsmaskinsjórar á fiskiskipum við framtøkumegi upp til 1499 kW. Treytin fyri hesum er tó, at teir hava minst 2 ára maskintænastu á skipum við framtøkumegi 750 kW ella størri.

ad 2) Hendan áseting er tann sama sum § 6, stk. 2 í verandi manningarlóg.

ad 3) Sambært broytingunum í STCW sáttmálanum eru tey áður settu mørkini 200 BRT og 1600 BRT broytt til ávikavist 500 BT og 3000 BT.

Tað at Sjóvinnufyrisitingin kann økja ella minka um førleikakrøvini er gjørt við atliti til tey broyttu tonsatølini. Við hesum kann Sjóvinnufyrisitingin byrgja fyri, at persónar, sum høvdu skiparaættindi (upp til 1600 BRT) treytaleyst kunnu fáa nógv størri rættindi á t.d. skipum, sum føra vandamiklan farm.

ad 4) Áseting er innlørd sum avleiðing av broytingunum í STCW-sáttmálanum. Átekningin, ella viðurkenningarváttanin, á tey útlendsku sjóvinnubrøvini, verður gjørd á tey sjóvinnubrøv, sum eru útgivin eftir teimum nýggju reglunum í STCW-sáttmálanum.

ad 5) Áseting í STCW-F-sáttmálanum krevur somuleiðis, sum í STCW-sáttmálanum, at sjóvinnubrøv skulu hava eina átekning sambært sáttmálanum. Áseting ger tað møguligt, at kunna gera hetta umsitingarliga, tá ið STCW-F sáttmálin kemur í gildi altjóða.

Til § 6

Ásetingin er gjørd sum avleiðing av, at gingið verður yvir til at nýta ta globalu neyð- og trygdarskipanina GMDSS, sum skal vera fult gjøgnumførd innan 1. februar 1999.

Til § 7

Kravið um at tað skal vera ein kokkur við skipum, sum hava eina manning uppá 8 ella størri, er nú komið inn aftur í lógina, eftir at tað varð tikið úr verandi manningarlóg í 1988, tá ið lógin varð gjørd.

Til § 8

ad 1) Ásetingin er broytt í mun til verandi manningarlóg. Sigliøkini eru broytt frá Heimasigling og Altjóða sigling til óvikavist Strandasigling og sigling uttanfyri Strandasigling. Eingi sjóvinnubrøv verða givin til stuttleikaskip, men í føroum hvar sjóvinnubrøv verða krevd, verða hesi krevd sambært reglunum fyri fiskiskip og handilsskip.

ad 2) Ásetingin er tann sama sum § 11, stk. 2 í verandi manningarlóg.

ad 3) Ásetingin er broytt í mun til verandi manningarlóg. Framtøkumegin 600 kW er broytt til 750 kW. Grundgevingin fyri hesum er tann, at eitt skip, sum hevur eina framtøkumegi undir 750 kW ikki verður umfatað av teimum altjóða sáttmálunum innan maskinøkið, men bert av tjóskaparligu lóggávuni.

ad 4) Ásetingin er tann sama sum § 11, stk. 4, bert tilvísingin til § 4, stk. 2 er broytt til § 4, stk. 4.

ad 5) Ásetingin, um at landsstýrið kann áseta førleikakrøv er broytt til, at Sjóvinnufyrisitingin kann áseta førleikakrøv. Hetta er í samsvar við manningarlógina.

Til § 9

Ásetingin er, við onkrari umskriving, tann sama sum § 12, stk 3 í verandi manningarlóg.

Til § 10

ad 1) Sum avleiðing av teimum nógvu broytingunum í útbúgvingarkrøvunum í seinastuni og eisini sum avleiðing av væntandi broytingum frá altjóða sáttmálum, er tað mett rættast, at broytingarnar kunnu setast í verk umsitingarliga, so hvørt sum útbúgvingarkrøvini verða broytt. Hetta verður gjørt í samráð við avvarandi myndugleikar og sjómanna- og reiðarafeløgini.

ad 2) Áseting er ein samanskriving av § 25 í verandi sjóvinnulóg og § 15, stk. 1 í verandi manningarlóg. Sambert hesum kann Sjóvinnufyrisitingin áseta førleikakrøv til skiparar við fiskiskipum og frítíðarførum undir 20 tons og krøv til maskinmanningina á hesum skipum.

ad 3) Ásetingin er, saman við 2. stykki, í samsvar við § 15, stk. í verandi manningarlóg.

Til § 11

ad 1) Krøvini til at fáa sjóvinnubrøv hava higartil verið ásett í bæði sjóvinnulógini og í tilhoyrandi kunngerðum.

Tað er mett rættast, at áseta hesi krøv umsitingarligt og samla allar verandi ásetingar í eina kunngerð.

Við hesum skuldi tað verið lættari at gjørt broytingar í takt við broytingar í altjóða sáttmálum, sum vit eru bundnir at, og ynskjum frá føroysku vinnuni.

Sum nýtt krav er sett, at viðkomandi ikki skal vera undir verjumáli, fyri at kunna fáa sjóvinnubrøv.

ad 2) Kravið um at ein við førarurættindum skal hava føroyskan/danskan heimarætt er tað sama sum í §§ 4,

6 og 9 í verandi sjóvinnulóg og § 6 a, stk. 2 í verandi manningarlóg.

Sambært hesum stykki verður nú heimilað landsstýrismanninum í sjóvinnumálum at víkja frá kravinum um heimarætt. Hetta kann gerast í serligum føri og í samráð við reiðara- og sjómannafelagini.

Sambært STCW-sáttmálanum, skal landsstýrismaðurin tó tryggja sær, at viðkomandi fær innføring í viðkomandi føroyska lóggávu og at viðkomandi málsliga kann samskifta við manningina.

Til § 12

ad 1-2) Ásetingin er í samsvar við § 1 í verandi kunngerð um sjóvinnubrøv og serlig útbúgvingarkrøv.

ad 3) Ásetingin er, við onkrari umskriving, tann sama sum í § 24, stk. 2 í verandi sjóvinnulóg. Her er tó skoytt uppí, at teir sum skulu hava fyrsta sjóvinnubrøv og sunnstundis hava eitt prógv, sum er eldri enn 5 ár, koma undir somu reglur sum teir, ið ikki hava sigla tey seinastu 5 árini.

ad 4) Ásetingin tryggjar heimild fyri at áseta reglur fyri áteking á útlendsk sjóvinnubrøv og sertifikatir í samsvar við ásetingunum í tí broytta STCW-sáttmálanum.

Til § 13

Ásetingin er tann sama sum § 28 í sjóvinnulógini. Her er tó skoytt uppí, at "inkompitansa" er eisini ein grundgeving fyri at kunna taka aftur eitt sjóvinnubrøv.

Til § 14

Ásetingin er tann sama sum § 29 í sjóvinnulógini.

Til § 15

Ásetingin er tann sama sum § 30 í sjóvinnulógini. Aftanfyri skulu tó innlatast til Sjóvinnufyrisitingina, sum vegna landsstýrið, hevur hesi í varðveitslu.

Til § 16

Ásetingin er, við onkrari umskriving, tann sama sum § 31 í sjóvinnulógini. Her er tó skoytt uppí, at rætturin til at fáa førararættindi aftur er ikki treytaleysur. Um viðkomandi ikki hevur siglt tey seinastu 5 árini, verða somu reglur at galda, sum ásett er í § 12, stk. 4, í uppskotinum til hesa lóg.

Til § 17

Ásetingin í hesi grein má metast sum ein tíðandi partur av tí broytta STCW-sáttmálanum. Álagt verður reiðarum fleiri týðandi skyldur, sum beinleiðis hava við trygdina at gera umborð.

Í 2. stykki er møguleikin opnaður fyri umsitingarligt at kunna áseta nærri reglur um hetta.

T. d. kann nevnast, at sambært STCW-sáttmálanum eru samskiftiskrøvini umborð gjørd strangari fyri ferðamannaskip enn fyri onnur handilsskip.

Reiðarin vil við hesum verða bundin til at geva skiparanum nakrar instruksir. Av hesi orsøk er tað mett rætt ast, at lata skiparan verða umfataðan av hesum somu ábyrgdareglum, sjálvt um sáttmálin hert nevnir reiðaran sum ábyrgdarhavaru.

Harafturat er tað mett rættast, at lata skiparar og reiðarar á øðrum skipum, sum ikki eru umfataði av STCW-sáttmálanum, t.d. fiskiskipum og frítíðarskipum, eisini at vera umfataði av somu ábyrgdareglum.

Fleiri av teimum ásetingum, sum nevndar eru í stk. 1, hava ikki áður verið í teimum føroysku sjóvinnulóg-

unum, men bert partvís í umsitingarligum reglum. Nevnast kann t.d. málkrav til manning umborð á ferða-, manna- og lastaskipum, sum við heimild úr ríkislóg "lov um skibes sikkerhed" eru lýstar í tekniskari fyriskipan frá danska sjóvinnustýrinum.

Uppskotið inniheldur ikki eina allýsing av einum reiðara. Fyri at kunna staðfesta, hvør er reiðari, skal í fyrstu atløgu vera gingið eftir eigaraviðurskiftunum. Men onnur viðurskifti kunnu gera seg galdandi, t.d. at ein persónur ella felag kann hava rættin til at disponera yvir skipinum. Við hesum kann ein korresponderandi reiðari ella ein bare-boat leigari, sum sjálvur setur manning, metast sum ein reiðari.

Til § 18

Ásetingin í hesi grein er, við onkrari umskriving, tann sama sum § 12 í verandi manningarlóg.

Til § 19

Ásetingin er tann sama sum § 13 í verandi manningarlóg.

Til § 20

Ásetingin er, við onkrari umskriving, tann sama sum § 14 í verandi manningarlóg. Tilvísingin til "bruttotons" er tó likin úr, av tí at bruttotonsatalið er nú innført sum málieind í lógini. Ásetingin í hesi grein kann bóast alt blívna aktuell, t.d. um tað vísir seg at verða neyðugt at broyta málieinheitina fyri fiskiskip og minni skip frá bruttotons til longd í metrum.

Til § 21

ad 1) Ásetingin, um at Sjóvinnufyrisitingin kann í serligum føri økja ella minka um manningartalið á skipinum, er tann samsvarandi § 15, stk. 1 í verandi manningarlóg.

ad 2) Ásetingin er, við onkrari umskriving, tann sama sum § 15, stk. 2 í verandi manningarlóg.

Til § 22

Ásetingin er tann sama sum § 16 í verandi manningarlóg. Undantøka kann eisini gerast á skip, sum gjøgnumganga munandi umbygging.

Til § 23

Ásetingin er, við onkrari umskriving, tann sama sum § 17 í verandi manningarlóg. Nevnast kann tó, at tað er mett rættast at innsela tær greinar, sum kunnu leggjast fyri Sjóvinnuráðið. Grundgevingin fyri hesum er, at fleiri av teimum avgerðum sum gjørdar verða við heimild úr verandi sjóvinnulóg og sum nú eru skrivaðar inn í uppskotið til manningarlógina, ikki kunnu leggjast fyri Sjóvinnuráðið.

Til § 24

Ásetingin svarar til § 18 í verandi manningarlóg. Tilvísingarnar til tær einstøku greinirnar eru í samsvar við fyriliggjandi uppskot til nýggja manningarlóg.

Av tí at reiðarans og skiparans ábyrgdarreglur eru komnar inn í uppskotið til lógina, verður revsifyriskipanin útbygd til eisini at umfata hetta.

Til § 25

Revsifyriskipanin fyri brot á reglurnar í § 17, stk. 1., 3., 4. og 5. stk. (reiðarans og skiparans ábyrgdarreglur) eru skerpaðar. Brot á lógina er her í samsvar við ríkislóg "lov om skibes sikkerhed".

Sjálvt um hetta stykkið í ríkislógini ikki er sett í gildi fyri Føroyar, er tað mett rættast at innføra skerpaðar revsifyriskipanir til hesar, fyri á hendan hátt at kunna byrgja fyri einumhvørjum "insitamenti" til at bróta lógina við tí endamáli at slaka uppá trygdina umborð við atliti til at vinna sparingar.

Til § 27

Lógin eigur at fáa gildi skjótast gjørligt, av tí at broytingarnar í STCW-sáttmálanum eru settar í gildi altjóða tann 1. februar 1997.

Til § 28

ad 1) STCW-sáttmálin ásetur, at siglandi við handilsskipum skulu vera úthógvin í samsvar við broytingunum í sáttmálanum í seinasta lagi 1. februar 2002.

Sjóvinnumyndugleikin skal ansa eftir hesum, tá tó tey gomlu sjóvinnubrøvini skulu skiftast út við nýggj sjóvinnubrøv.

Talan kann vera um, eitthvørt skeið, sum viðkomandi skal taka, fyri at fáa full rættindi sambært broytta sáttmálanum. Í fylgisskjalinum til lógaruppskotið eru hesi viðurskifti útgreinað.

Reglurnar um endurnýggjan av sjóvinnubrøvum vilja eisini verða gjørdar við atliti til ásetingarnar í § 12, stk. 4 (ikki sitgt 5 tey seinastu árini) í uppskotinum til lógina.

ad 2) Ásetingin er rættað móti nøkrum eldri skipum, sum bert eru máld upp í bruttoregistartonsum.

Til § 29

Ásetingin er tann sama sum § 21 í verandi manningarlóg.

Fylgiskjal til kunngerð

Dagføring av førleikakrøvum v. m. sum krevt fyri endurnýggjan av sjóvinnubrøvum sambært ásetingunum í § 32 í kunngerðini

Tann, ið hevur sjóvinnubrøv, sum gevur rættindi til tænastu við handilsskipum, skal lúka krøvini í STCW-sáttmálanum frá 1978, ið varð munandi broyttur í 1995. Tann broytti sáttmálin varð settur í gildi tann 1. februar 1997. Tó eru ávísar skiftisreglur galdandi fram til 1. februar 2002. Á talvuni niðanfyri verða tey sjóvinnubrøv, ið eru útgivin sambært STCW-sáttmálan, soleiðis sum hann var áðrenn 1. februar 1997, nevnd 1978-vinnubrøv, meðan vinnubrøv, ið eru útgivin sambært ásetingunum í tí broytta sáttmálanum verða nevnd 1995-vinnubrøv. 1978-vinnubrøv fara úr gildi tann 1. februar 2002. Framhaldandi tænasta eftir henda dag er treytað av, at viðkomandi hevur eitt 1995-vinnubrøv. Fyri at fáa tey 1978-vinnubrøv, ið nevnd eru í niðanfyristandandi talvu býtt um við 1995 vinnubrøv er tað ein treyt, at tey á talvuni nevndu førleikakrøv eru lokin. Sjóvinnubrøv, svarandi til tey nevndu, men við øðrum heitum ella avmarkingum, skulu lúka ásetta kravið til endurnýggjan í mun til prógv og prógvtøkuár. Sjóvinnubrøv hjá maskinyvirmonnum verða mett at lúka treytirnar í tí broytta sáttmálanum.

Gjald verður ikki kravt fyri luttøku á teimum kravdu skeiðunum.

Fyri tólki við í minsta lagi eitt ára tænastu sum navigatørar undanfarnu 5 árini verður radarsimulatorskeið og ARPA-simulatorskeið hildið sum eitt samansett 5-daga skeið. Fyri aðrar navigatørar varar hvørt skeiðið 4 dagar og radarsimulatorskeiðið skal takast fyrst. Sleppast kann undan at taka radarsimulatorskeið, men tá verður árit gjørt á vinnubrævið hjá viðkomandi um, at tað ikki gevur rættindi til at vera í starvi við skipum, sum eru útgjørd við ARPA.

Skeið í vandamiklum farmi varar í 3 dagar.

Áður útgivin prógv frá góðkendum skúla fyri at hava staðið nevndu skeið verða góðkend. Sjóvinnulyrisitingin kann somuleiðis góðkenna prógv frá øðrum skeiðum eftir meting í hvørjum einstøkum føri.

1978-vinnubræv (sambært STCW-sáttmálanum frá 1978)		
Heiti vinnubrævsins	Tænasta og avmarking samb. STCW-átit	Prógv
Stýrimaður á 3. stigi	Chief Mate, ships of less than 1600 GRT, Officer in charge af a navigational watch	Skiparaprógv áðrenn 1991
Stýrimaður á 2. stigi	Chief Mate, ships of less than 1600 GRT, Officer in charge af a navigational watch	Skipsføraraprógv 1983 ella fyrr
Stýrimaður á 1. stigi	Chief Mate	Skipsføraraprógv 1983 ella fyrr
Skipari	Master, ships of less than 1600 GRT, Officer in charge af a navigational watch	Skiparaprógv áðrenn 1991 ella stýrimannsprógv
Skipsførari	Master	Skipsføraraprógv 1983 ella fyrr

1995-vinnubræv (sambært STCW-sáttmálanum dagf. í 1995)		
STCW-reglugerð	Tænasta og avmarking samb. STCW-árit	Førleikakrav til endurnýggjan
II/1, II/2	Chief Mate, ships of less than 3000 GT, Officer in charge af a navigational watch	Radar-simulatorskeið ARPA-simulatorskeið ella vinnubræv avmarkað til skip uttan ARPA
II/1, II/2	Chief Mate, ships of less than 3000 GT, Officer in charge af a navigational watch	ARPA-simulatorskeið ella vinnubræv avmarkað til skip uttan ARPA
II/2	Chief Mate	ARPA-simulatorskeið ella vinnubræv avmarkað til skip uttan ARPA
II/1, II/2	Master, ships of less than 3000 GT, Officer in charge af a navigational watch	Radar-simulatorskeið ARPA-simulatorskeið ella vinnubræv avmarkað til skip uttan ARPA Skeið í vandamiklum farmi
II/2	Master	ARPA-simulatorskeið ella vinnubræv avmarkað til skip uttan ARPA

1. viðgerð 22.06.1998. Uppskotið verður beint í vinnunevndina, sum tann 24. juni 1998 legði fram soljóðandi:

Álit

Málið er lagt fram av landsstýrinum tann 18. juni 1998 og er eftir 1. viðgerð tann 22. juni 1998 beint í vinnunevndina.

Nevndin hevur viðgjørt málið á fundi 23. juni 1998. Nevndin átalar, at so stutt tíð er sett av til viðgerð av hesum máli. IMO frestin fyri broyting viðvíkjandi manningarlógarkrøvum, sum sett er til 1. august 1998, hevur verið landsstýrinum greið í fleiri ár, og hóast hetta var uppskot ikki lagt fyri løgtingið um broyting av manningarlógini samsvarandi hesum krøvum fyrr enn í vár, og nú vegna løgtingsvalið endurframsett í summar. Var rætt atborið, so skuldi uppskot til nýggja manningarlóg verið lagt fram fyri langt síðani soleiðis, at vinnunevndin fekk stundir at viðgera hetta fyri okkara høvuðsvinnu so týdningarmikla mál.

Ein meiriluti í nevndini, Heini O. Heinesen, Jákup Sverri Kass, Jákup Suni Joensen og Jógvan á Lakjuni er av teirri áskoðan, at sum minst av almennum rættarreglum sjóvinnu okkara viðvíkjandi eigur at verða ásett við kunngerð. Hetta er lógartilfar, sum løgtingið eigur at taka støðu til við løgtingslóg. Uppskotið til manningarlóg gongur øvugtan vegin, men sum umstøðurnar eru, hevur meirilutin tó gjørt av ikki at gera broytingaruppskot í lógaruppskotinum samsvarandi hesum.

Til § 10 í lógaruppskotinum viðmerkir sami meirilutí, at ynskiligt er, at landsstýrið í sambandi við áseting av førleikakrøvum til manningina tryggjar sær, at ungir menn, og kvinnur, hava atgongd til rættiliga tíðliga, antin í framhaldsdeild fólkaskúlans ella í kvøldskúlaskipanini, ókeypis at fáa ta undirvísing, sum neyðug er fyri, at teir kunnu lúka manningarførleikakrøvini soleiðis, at tað ber teimum til við stuttum skábrái at fáa manningarkjans, sum býðst.

Meirilutin í nevndini hevur latið kannað, um útbúgvingarskipan okkara er før fyri at uppfylla tey útbúgvingarkrøv, sum nú verða sett sbr. kunngerð við heimild í manningarlógini § 10 sbr. altjóða sáttmálum. Frá Undirvísingar- og Mentamálastýrinum verður upplýst, at útbúgvingarnar eru í samsvar við STCW-F sáttmálan og aðrar altjóða sáttmálar á økinum.

Meirilutin í nevndini er varugur við ávísar villur og setir samsvarandi hesum fram soljóðandi broytingaruppskot:

b r o y t i n g a r u p p s k o t

1) Í § 2 nr. 16) verður "mentamálastýrinum" broytt til "Mentamálastýrinum"
2) Í § 5 talva 6 verður "100-749" broytt til "450-749"
3) Í § 8 verður typografiska uppsetingin rættað
4) Í § 11 stk. 2 verður orðið "danskan" strikað
5) Í § 12 verða nr. á stk. rættað
6) Í § 16 verður orðið "danskan" strikað í tveimum førum
7) Í § 24 stk. 1 ganga út orðini "ella 6"
8) Í § 29 stk. 2, 2. pkt. verður orðið "Føroyum" broytt til "Danmark"

Ein minnilutí í nevndini, Henrik Old og Alfred Olsen, tekur ikki undir við uppskotinum. Undir nevndarviðgerðini bar ikki til, at koma á tal við nakran av teimum limunum sum umboðaðu vinnuna í nevndini sum sett var at gera uppskot um broyting í STCW og nýggja STCW-F95-sáttmálan hjá IMO. Minniluin kann tí ikki taka undir við at hasta hetta álvarsmál ígjøgnum løgtingið. Harumframt verður vikið munandi frá prinsippinum um, at mest møguligt skal ásetast í lógarsmíði og minst møguligt skal ásetast av landsstýrinum við kunngerð. Her verður farið øvugta vegin við at ásetu so at sigu øll krøv við kunngerð

2. viðgerð fríggjadagin 26. juni 1998. Broytingaruppskot til §§ 2, 5, 8, 11, 12, 16, 24 og 29 samtykt 13-9-0. §§ 2, 5, 8, 11, 12, 16, 24 og 29 soleiðis broyttar samtykt 13-0-9. §§ 1, 3, 4, 6, 7, 9, 10, 13, 14, 15, 17, 18, 19, 20, 21, 22, 23, 25, 26, 27 og 28 samtyktar 13-0-9. At málið soleiðis samtykt kann fara til 3. viðgerð samtykt 13-0-9.

3. viðgerð, 30. juni 1998. Uppskotið, sum samtykt við 2. viðgerð, endaliga samtykt 14-0-12.

Løgtingslóg nr. 63 fr 03. 07. 1998.

F.L.J. nr. 1601-2/90.

100-1 Fyrispurningur til Kristian Magnussen, landsstýrismann, viðv. fosturtøkulógini og hagtølum frá fosturtøkum seinastu 5 árini

Ár 1997, mikudagin 30. juli 1997 boðaði formaðurin frá omanfyri nevnda fyrispurningi frá Jenisi av Rana, løgtingsmanni, sum var soljóðandi

1) Hvør er orsøkin til, at aldursmarkið fyri, nær fosturtøka kann verða framd, er hægri í Føroyum (16 vikur) enn í grannalondum okkara?
2) Hvør er frágreiðingin til, at føroyska lógin enn, 38 ár eftir ígildissetanina, er í gildi sambært einari kongaligari kunngerð, ið var ætlað at vera fyribils?
3) Hvussu nógvar fosturtøkuumsóknir vórðu noktaðar á sjúkrahúsum okkara árliga (seinastu 5 árini)?
4) Hvussu nógvar, ið søktu um fosturtøku, vórðu av sjúkrahúsum okkara vístar til serfrøðingar til metan og evt. viðgerð (árliga síðstu 5 árini)?
5) Hvussu eru framdu fosturtøkurnar seinastu 5 árini býttar eftir:
   1. Aldursbólkum
   2. Geografiskt
   3. Socialstøðu
   4. Hjúnabandsstøðu
6) Hvørjar av lógarinnar orsøkum (indikatiónum) hava, seinastu 5 árini, verið nýttar, tá fosturtøkur eru framdar - í 5?
7) Hvør/hvørjir hættir vórðu brúkt á sjúkrahúsum okkara til framdu fosturtøkurnar hesi 5 árini?

Viðmerkingar

Seinastu árini hava uppskot og fyrispurningar verið á Føroya Løgtingi viðvíkjandi núverandi fosturtøkulóg, m.a. fyrispurningur um hvussu henda verður praktiseraða, og uppskot hava verið til broytingar.

Undir arbeiðinum/viðgerðunum av hesum uppskotum og fyrispurningum, hevur tað víst seg at vera trupult at fáa til vega neyðug hagtøl í hesum álvarsama máli. Sama trupulleikan tykjast nevndirnar og avvarðandi landsstýrismenn at hava havt, tí í tilmælum og svarum hava oftast ógreiðar orðingar verið, t.d. *metast má, ítarleikin tykist vera o.s.v.*, í staðin fyri nágreinilig tøl, ið kundu lýst fosturtøkuviðurskiftini, og sum kundu verið brúkt til samanberðan/metan við hesi viðurskifti í grannalondunum okkara.

Sum dømi um veikleikan við manglandi hagtølum, kunnu verða nevnd tey tøl, ið eru brúkt undir politisku

viðgerðini, av teim tilburðum, tá vandi kann standast fyri lívinum hjá nammunni. Har eru nevnd tøl frá 10 til 20 árliga, samstundis sum danskir serfrøðingar á økinum meta, at slíkar umstøður, mett út frá hagtølum í grannalondunum okkara, neyvan kunnu koma fyri í Føroyum, meira enn áttanda til tíggjunda hvert ár.

Umbidnu hagtølini áttu so avgjørt í einum samfelag á okkara støði at verið almenn tøl, og verið ein partur av grundarlagnum undir arbeiðinum at loysa trupulleikan og sorgarleikin, sum hvor einstøk fosturtøka er!

Galdandi lóg varð í 1959 sett í gildi í Føroyum við kongaligari fyriskipan. Henda fyriskipan *ger undantak fyri eitthvørt av hesum greinunum í lógini*, til vit í Føroyum hava fingið: »mødrehjælpsinstitution eller dertil svarende institution«. Serkøvir á økinum siga frá tí tíðini, at undantakið var neyðugt, tí at vit tá ikki høvdu nóg nógvar útbúnar serlæknar, ið annars vórðu neyðugir, um vit skuldu fylgt lógini uttan umtalaðu kongaligu fyriskipan.

Men nú eru allir hesir serlæknar (og nað fyri mongum árum síðani) tøkir, men stig eru ikki tikin til at brúka hesar, so kongaliga fyriskipanin kann verða tikin av.

Í flest øllum londum, vit vanliga samanbera okkum við, er markið fyri, nær fosturtøka er loyvd, vætt lægri enn okkara. Tí loyvir undirritaði sær at spyrja, hvat grundarlagið er undir, at føroyski politiski myndugleikin gevur loyvi til fosturtøku í einum tíðarskeiði í graviditetinum, har sjálvt land, har fosturtøkan er frí, ikki geva slíkt loyvi.

1. august 1997 varð við 19-0-0 atkvøðum samtykt, at fyrispurningurin skuldi svarast.

23. september 1997 svaraði Kristian Magnussen, landsstýrismaður, fyrispurninginum soleiðis:

1) Ein kvinna í Danmark hevur rætt til *frían* fosturtøku innan 12. viku. Eftir 12. viku kann ein kvinna fáa framt fosturtøku, um vandi er fyri lívinum ella heilsuni hjá kvinnuni, um hon gjøgnumførir graviditetin.

Eftir tí lógini, sum er galdandi í Føroyum, er *ikki* talan um fría fosturtøku, hvørki áðrenn ella aftaná 16. viku. Sambært hesi lóg skal talan verða um fysiska ella psykiska sjúku, vandi skal vera fyri barnínum, kvinnan skal vera neyðtikin, ella skal kvinnan av fysiskum ella psykiskum orsøkum ikki vera før fyri at taka sær av barninum. Hesar treytir/krøv skulu verða uppfylt, um ein kvinna *yvirhovur* skal fáa framt fosturtøku í Føroyum.

Samanbera vit hesi londini, so er 12. vika í Danmark markið fyri frían ella ikki frían fosturtøku, og eftir hesa viku skulu so nøkur kriterier vera uppfylt, fyri at ein kann fáa framt fosturtøku. Í Føroyum skulu hesi kriterier longu vera uppfylt frá fyrsta degi av.

2) Lógin, sum er galdandi í Føroyum, er ein donsk lóg, sum er sett í gildi í Føroyum við kongaligari fyriskipan. Lógin er frá 1956, men seinast broytt í 1988. Broytingaruppskot eru fleiri ferðir lagd fram í tinginum tey seinastu árini, men fullu.

3) Seinastu 5 árini vórðu hesar fosturtøkur framdar á teimum trimum sjúkrahúsunum.

	Landssjúkrah.	Klaksv. sjúkrah.	Suður. sjúkrah.	Alt
1991	50	0	8	58
1992	57	1	2	60
1993	49	2	3	54
1994	50	0	3	53
1995	50	0	3	53
1996	37	0	0	37

Verandi skráseting í sjúkrahúsverkinum sigur bara frá framdum fosturtøkum, ikki frá umsóknum. Tað ber tí ikki til at siga, hvussu nógvar fosturtøkur eru noktaðar, uttan so at allar journalir fyri kvinnur í fertilum aldri verða leitaðar igjøgnum, bæði innan sjúkrahúsverkið og hjá øllum kommunulæknum.

4) Tað eru kommunulæknarnir, sum senda fosturtøkuumsóknir til sjúkrahúsverkið, og tá hesir verða metnir at vera kompetentir til at meta um psykisku støðuna hjá sjúklingum sínum, hava serlæknarnir í gynækologi í fleiri førum ikki havt orsøk til at ávísa sjúklingin til annan serlækna, t.d. í psykiatri. Hesin spurningur krevur eisini, at allar journalir yvir tær kvinnur, sum hava fingið framt fosturtøku, verða leitaðar igjøgnum. Annars er tað ikki eitt krav sambært lógini, at ein t.d. psykiatari skal vera við til at taka avgerðum ein kvinna skal fáa framt fosturtøku ella ikki. Tað stendur, at avgerðin skal takast av einum/tveimum góðkendum læknum.

5) Fosturtøkurnar á Landssjúkrahúsinum seinastu 5 áriti hava býtt seg soleiðis í aldurshólkar:

Undir 19 ár	13%
20-29 ár	41%
30-39 ár	32%
40 ár og yvir	14 %

57% hava búð í høvuðsstaðarumráðnum. Tað hevur ikki eydnast at fáa upplýst hjúnabandsstøðu og sosiala støðu. Hetta eru upplýsingar, sum ikki eru skrásettir, tí sambært lógini eru hetta ikki kriterir, sum skulu takast við, tá ið støða skal takast til, um ein kvinna skal fáa framt fosturtøku, sí § 1 í lógini.

6) Á landssjúkrahúsinum hava indikatiónirnar stórt sæð verið eftir grein 1, stk. 1, í lógini um fosturtøku fyri at fáa framt fosturtøku.

7) Hættirnar sum vórðu brúktir á Landssjúkrahúsinum, eru forviðgerð við tablettum (prostaglandinum) og síðani vacuum (exairesis), tá fostrið hevur verið undir 12 vikur. Tá fostrið hevur verið yvir 12 vikur, eru tablettir (prostaglandinir) saman við dropp (syntocinon) nýtt.

100-2 Fyrispurningur til John Petersen, landsstýrismann, viðv. Nólsoyar Pálli, Nim og Vaktar- og Bjargingartænastuni

Ár 1997, týsdagin 30. september 1997 boðaði formaðurin frá omanfyri nevndu fyrispurningi frá Lassa Klein, løgtingsmanni, sum var saljóðandi

1) Kann landsstýrismaðurin vísa aftur, at tað er ikki óvanligt at skifta tardar plátur út á gomlum skipum? Kann landsstýrismaðurin ikki taka undir við, at hetta er meira reglan enn undantakið frá reglum?
2) Kann landsstýrismaðurin ikki vátta, at arbeiðið, sum eftir er at gera við Nólsoyar Páll, kann gerast fyri minni enn 12 mió. kr., so sum upprunaliga mett?
3) Um eitt nýtt vaktarskip verður bygt, kann landsstýrismaður so geva løgtinginum vissu fyri, at tilboð uppá nýtt skip verður sent øðrum útlendskum skipasmiðjum?
4) Kann landsstýrismaðurin vísa aftur, at hann hevur brúkt verandi og fyrrverandi eigarar av skipasmiðjunum í Føroyum sum ráðgevarar í sambandi við Nólsoyar Páll?
5) Kann landsstýrismaðurin ikki geva løgtinginum viðhald í, at hava hesir menn verið ráðgevarur hansara í sambandi við Nólsoyar Páll, so kann her verða talan um teir - í hesum døgum - su nógv umrøddu habilitetstrupulleikarnar?

6) Løgtingið hevur givið eina játtan uppá 1,8 mió. kr. so Nim, sum er heimahoyrandi á Tvøroyri, kann verða vaktarskip. Kann landsstýrismaðurin upplýsa løgtinginum, hvussu nógvar effektivar dagar, Nim hevur havt til vaktartænastu?

7) Nú Nim hevur verið á skipasmiðju og gjort umvælingar fyri fleiri milliónir krónur, kann landsstýrismaðurin upplýsa fyri løgtinginum, hvussu nógv hetta hevur kostað.

8) Kann landsstýrismaðurin vissa løgtingið um, at landskassin ikki hevur goldið fyri hesar ábøtur og heldur ikki kemur at gjalda fyri tær?

9) Kann landsstýrismaðurin vátta fyri løgtinginum, at kranin, sum er settur í Nim, ikki kundi brúkast, og kann landsstýrismaðurin taka undir við, at Nim als ikki er egnað sum vaktarskip, tí skipið manga tovmegi hevur og heldur ikki hógskrúvu?

10) Kann landsstýrismaðurin upplýsa løgtingið um, hví eitt skip, sum lá klárt í Klaksvík - nevnt »Straukur« - og sum ikki kravdi ábøtur, ikki kundi húka treytirnar sum vaktarskip, hóast tað hevði rokt uppgávur fyri føroyska vitaverkið, og tí eisini varð mett vælegnað sum vaktarskip?

Viðmerkingar

Tað lýkist verða ørkymlandi, hvat ið fer fram við skipunum hjá Vaktar- og Bjargingartænastuni, og tað hevur stóran týdning, bæði fyri trygdina á sjónum og umsitingarligu ábyrgdina uppi á landi, at ivin um Vaktar- og Bjargingartænastuna fæst burtur sum skjótast. Tað sigur seg sjálvt, at tað er ein kostnaðarmikil loysn fyrst at selja og síðan keypa eitt gamalt skip úr Fraklandi, at seta tað í stand fyri nógvar milliónir og síðani stoðga arbeiðnum og heldur leiga eitt fiskiskip til vaktarskip, leiga Lars Kruse til Sjómansskúlan og so siga seg vilja byggja nýtt. Hvat kemur alt hetta at kosta landskassanum?

7. oktober 1997 varð við 23-0-0 atkvøðum samtykt, at fyrispurningurin skuldi svarast.

29. oktober svaraði Jóhn Petersen, landsstýrismaður, fyrispurningunum soleiðis:

ad. sp. 1) Tað er sera óvanligt at skifta so nógv út av tærdum stálplátum í einum skipi, sum hevur verið undir altjóða góðkendum klassaeftirliti í 26 ár. Mátingarnar um borð á »Nólsoyar Páll« vístu, at fleiri av plátunum áttu at verið skiftar út fyri fleiri árum síðani. Tað arbeiðið, sum er gjort higartil á Skála, er bert ein lítil partur av eftirverandi stálarbeiði. Umframt klædningur og dupult botnaður toptangar er neyðugt at skifta út allar tærdar stálplátur, so hvørt sum hetta kemur fram undir umvælingararbeiðinum.

ad. sp. 2) Fyri at gera »Nólsoyar Páll« aftur soleiðis, at skipið kann útføra eitt part av teimum somu uppgávum, sum í dag verða gjørdar av »Tjaldrinum«, so skulu **26,0 mió.kr.** brúkast uppá skipið. Um hetta skuldi verið gjørt, so kemur »Nólsoyat Páll« **samanborið við »Tjaldrið«** bert at hava 69% av maskinorku, 70% sleipiorku og eina ferð uppá 12,0 hj/t.

Haraftrat kemur, at skipið er gamalt, og at allar rorskipanirnar eru niðurkoyrdar, at eykalutir ikki kunnu útvegast í framtíðini, at skipið er torført at »manovrera«, og at skipið ongantíð kemur at verða eitt átak í arbeiðinum hjá Fiskiveiðieftirlitinum til vaktar- og bjargingartænastu.

Eftir umbygging kann skipið haraftrat táa eitt álvarsamt trupulleika við fríbordinum á vetrardegi í Norður Atlantshavi, sum saman við stabilitetstrupulleikum kann koma at hava við sær, at skipið bert kann brúkast um summarið í góðum veðri. Samanumtikið er stórur ivi, um hetta skip yvirhøvur fær loyvi at sigla á okkara leiðum.

ad. sp. 3) Eins og gjørt hevur verið, tá arbeiðið uppá »Nólsoyar Páll« hevur verið boðið út í Føroyum og uttanlands, so verður tilboð uppá bygging av nýggjum skipi eisini boðið út í Føroyum og uttanlands.

ad. sp. 4) Landsstýrismaðurin hevur fyrrverandi leiðaran av Fiskiveiðieftirlitinum havt alla ábyrgdina av tí umvælingararbeiði, sum varð gjørt fram til 22. november 1996, tá landsstýrismaðurin saman við fiskivinnu-

stjóranum í Tinganesi steðgaði øllum arbeiði uppá skipið vegna meinýtslu av teirri játtan, sum varð sett av til alla ætlanina við »Nólsoyar Páll«.

Fiskiveiðieftirlitið hevði undan hesum leita sær ráð, fyrst hjá P/F Tór Shipping um keypssáttmálan, herundir klassakrøv, hjá P/F Sjótek og skipasmiðjunum í Føroyum um umvælingararbeiðið og eftirlit við hesum. Landsstýrismaðurin hevur bildið seg til kanningina hjá 3-manna nevndini, tað útboðstilfar, sum varð gjørt av serkønum hjá Fiskiveiðieftirlitinum, og til seinast metingina hjá Shipshape AG.

ad. sp. 5) Spurningurin er svaraður undir sp. 4), og mugu umrøddu habilitetstrupulleikar vísast burtur.

ad. sp. 6) Tað gekk seru striltið hjá Fiskiveiðieftirlitinum at útvega hóskandi skip til leigu. Tann 24. juni 1997 varð avgjørt av leiga »Nim« frá Deep Sea Ltd. á Tvøroyri. Eigarin metti tá, at skipið kundi takast yvir tann 17. juli 1997, men tað gekk út um tíðina, og tann 23. august fór »Nim« í tænastu. Skipið hevur verið í tænastu síðani, men hevur tó ligið onkran dag til okkurt smávegis.

ad. sp. 7) Um »Nim« er umvældur fyri fleiri milliónir, so er hetta Fiskiveiðieftirlitinum og landsstýrismanninum ókunnugt.

Tað, sum stovnurin hevur kravt út um leigusáttmálan, hevur kostað tilsamans 397.506,00 kr. Hesar útreiðslur eru býttar soleiðis:

Til skipasmiðjunn fyri bátastól, sleipiklyss og at mála skipið frá vatnlinju til yvirdekk og at seta útgerð upp kr. 232.086,00, til ísetan av nautiskari og samskiftisútgerð kr. 33.425,00, til tól á brúnni kr. 31.995,00 og til viðlíkahaldsarbeiði eru brúktar kr. 100.000,00 kr.

Upplýsast kann, at tá leigutíðin er úti, verða bátastólur, sleipiklyss og nautisk útgerð tikin niður aftur.

ad. sp. 8) Í leigusáttmálanum er ásett, at »Nim« skal lúka øll skipasýniskrøv og hava klassaskjøl uttan viðmerkingar. Eigarin hevur soleiðis goldið allar útreiðslur av at klassa skipið og fyri ísetta kranan.

ad. sp. 9) Tað vóru seinkingar vegna krøv frá skipasýninum um ísetta kranan og nýtslu av øðrum krana, sum er um borð til MOB-bátin. Eftir trykkroynd fekst hetta í rættlag. Um kranan kann upplýsast, at hesin er 40 T/M, meðan tann um borð á »Tjaldrinum« er 21 T/M. Kranarnir eru til sama endamál.

»Nim« hevur higartil ikki avvíst nakra uppgávu og hevur sleipa onkran av teimum stóru djúpvatnstrolarunum. Tað vildi verið ynskiligt við eini bógskrúvu, men hetta krevur større flogukostnað og broytingar í skipinum sum heild. Upplýsast kann, at skipið hevur tikið onkran veiðitjóv.

ad. sp. 10) Spurningurin um nevndu skip er ikki relevantur. Fiskiveiðieftirlitið hevði undir teirri drúgvu royndini at finna hóskandi skip brúk fyri einum skipi, ið kundi nýtast sum føroyskt vaktarskip.

Nevndu útlendska skipið mátti fyrst lúka krøv frá skipasýninum, serstakliga brandkrøv og um eldslokking fyri at verða góðkent sum føroyskt vaktarskip. Landsstýrismaðurin hevði ongar ætlanir um at nýta ónýtilig útlendsk skip til ta føroysku vaktartænastuna, og nevnda skip sigldi í dag undir útlendskum flaggi.

Viðmerkingar

Í viðmerkingunum hjá Lassa Klein, løgtingsmanni, verður fert fram, at tað er ein sera kostnaðarmikil loysn at selja, keypa og umbyggja eitt gamalt skip fyri síðani at byggja eitt nýtt skip til føroyskar vaktartænastuna.

Landsstýrismaðurin í fiskivinnumálum hevur alla tíðina víst á, at »Nólsoyar Páll« er eitt yvirtikið mál frá undanfarna landsstýri og »Ólavur Halgi«, sum í sínum tíð var ein neyðloysn til ta føroysku vaktar- og bjarg-

ingartænastuna, longu var seldur av landinum. Somuleiðis hevur alla tíðina verið fört fram, at bygging av einum nýggjum skipi til Fiskiveiðieftirlitið, herundir vaktar- og bjargingartænastu er einasta rætta loysnin.

Onnur mál sum sigling við nømingum frá sjómansskúlunum og umhvervismál hoyra ikki undir málsøkið hjá landsstýrismanninum í fiskivinnumálum, og kemur tænastan um fiskiveiðieftirlit og vaktar- og bjargingartænastu í framtíðini at verða skipað samsvarandi.

100-3 Fyrispurningur til Kristian Magnussen, landsstýrismann, viðv. Hotel Tórshavn í Keypmannahavn

Ár 1997, týsdagin 30. september, bókaði formaðurin frá omanfyri nevnda fyrispurningi frá Rúna Sivertsen, løgtingskvinnu, sum var soljóðandi

1. Ætlar landsstýrið framhaldandi at leiga høli í Gothersgade 160 til at hýsa Hotel Tórshavn
2. Hvør hevur fyrisitingarligu ábyrgdina av Hotel Tórshavn
3. Hvør umsitur »Den selvejende stiftelse Hotel Tórshavn«
4. Hvør reglugerð er galdandi fyri »den selvejende stiftelse Hotel Tórshavn«
5. Eru aðrir leigumøguleikar fyri Hotel Tórshavn kannaðir, nær varð kanningin gjørd, og hvør varð niðurstøðan
6. Metir landsstýrið heilsuligu umstøðurnar á Hotel Tórshavn nóg góðar til tað, ið hotellið í dag verður nýtt til.

Viðmerkingar

ad) 1. Ár 2005 gongur leigusáttmálin, sum varð undirskrivaður 29. februar 1996 av Føroya Landsstýri við Ejendomsselskabet EBC A/S út. Sjúkrahústýrini, sum sambært landsstýrisins meting hevdu endaligan fyrisitingarligan avgerðarrætt hevdu frárátt nýggjum leigusáttmála og á fleiri fundum umrøtt og havt ætlanir um aðra loysn fyri Hotel Tórshavn.

ad) 2-3-4. Av leigusáttmálanum framgongur, at sáttmálin er gjørdur við: Den selvejende stiftelse »Hotel Tórshavn«.

ad) 5. Á felagsstýrisfundi 13. september 1995 heitti stýrini fyri tey trý sjúkrahúsini á landsstýrið um at bíða við at undirskriva nýggjan leigusáttmála, til aðrir møguleikar vóru kannaðir.

ad) 6. Tá Hotel Tórshavn fyri 22 árum síðan varð sett á stovn, var tað ætlað sum tilhaldsstað fyri fiskum avvarandi. Í dag verður hotellið, orsakað av sparingum á Ríkissjúkrahúsinum, ernini nýtt til ógvuliga sjúk fólk.

7. oktober 1997 varð við 23-0-0 atkvøðum samtykt, at fyrispurningurin skuldi svarast.

5. november 1997 svaraði Kristian Magnussen, landsstýrismaður, fyrispurningjunum soleiðis:

ad sp. 1. Føroya Landsstýri hevur tann 29. februar 1996 undirskrivað leigusáttmála, ið gongur út ár 2005, fyri høli, har Hotel Tórshavn heldur til. Landsstýrið hevur ongar ítøkiligar ætlanir um at samráðast við útleigaran um uppsøgn av nevnda sáttmála.

Møguleiki er frá 30. september 2000, við seks mánaða freist at uppsiga leigumálið til tann 1. apríl 2001.

Landsstýrismaðurin hevur fyri sjúkrahúsverkinum umrøtt spurningin um at finna onnur høli. Sjúkrahúsverkið metir, at treytin er, at játtanin verður hækkað, tí væntast má, at nýggj hølir verða munandi dýrari enn tey. Verður avgerð tikin um nýggj hølir, má útbygging av verandi hølum steðgast.

Tað er greitt, at tørvurin á Hotel Tórshavn í stóran mun er tengdur at, hvørjar ætlanir eru um sjúklingaviðgerð uttanlands. Tað er ongin ivi um, at tað framhaldandi fer at vera tørvur á at senda sjúklingar av landinum. Hesin tørvur hevur tó ikki greið mørk. Tí ber at senda færri, og tí ber at senda fleiri.

Sjúkrahúsini í Danmark eru greitt áhugað í at viðgera føroyskar sjúklingar, so leingi sum vit gjalda fyri tað, fyri tey er tað ein spurningur um inntøkumøguleikar. Hinvegin viðførir tað, um sjúklingar, sum tí ber at viðgera í Føroyum, verða sendir av landinum, at førleikin í føroyska sjúkrahúsverkinum minkar fyri hvønn sjúkling, vit senda avstað.

Um vit soleiðis útbýggja hotellkapasitetin í Keypmannahavn, bæði í tali av seingjarplássum og í góðsku, er hetta ein ábending um, at vit ætla at økja um virksemið í Keypmannahavn. Tað er ikki víst, at hetta er rætta leiðin.

Sjúkrahúsverkið arbeiðir í løtuni við teirri fortreyt, at vit skulu í so stóran mun sum tí ber, klára viðgerðirnar í Føroyum á samta góðskustigi sum á Ríkissjúkrahúsinum. Hendan fortreyt byggir m.a. á, at tað er munandi lættari at viðgera sjúklingar her og betri fyri sjúklingarnar, sum so sleppa undan tí ofta sera slítandi ferðingini millum lond. Eitt gott dømi um miðvíst arbeiði við at flyta viðgerðir til Føroya til bata fyri sjúklingarnar er viðgerðin av krabbameinssjúklingum.

Vit hava ongar ábendingar í dag um, at tann viðgerð, sum sjúkrahúsverkið fremur, hevur lægri góðskustig enn tað, sum Ríkissjúkrahúsið letur. Eftirlitsmyndugleikin er hin sami, nevniliga danska heilsustýrið.

að sp. 2. Hotel Tórshavn er ein stovnur undir Sjúkrahúsverkinum, og sum so hevur tann til hvørja tíð sitandi landsstýrismaður í heilsumálum fyrisitingarligu ábyrgdina av Hotel Tórshavn.

að sp. 3. Sjálvsognarstovnurin Hotel Tórshavn ella »den selvejende stiftelse Hotel Tórshavn«, helt uppat at virka í 1986, tá táverandi stýrið bað Føroya Landsstýri yvirtaka stovnin. Síðani hevur Hotel Tórshavn verið ein almennur stovnur.

að sp. 4. Eingi eitur í dag »den selvejende stiftelse Hotel Tórshavn«, tí her ikki tí at svara spurninginum um, hvør reglugerð er galdandi.

að sp. 5. Í 1991 gjørdi táverandi sjúkrahússtjórin eina kanning eftir áheitan frá Føroya Landsstýri.

Sjúkrahúsverkið fekk tá tilboð frá stjórnini á Ríkissjúkrahúsinum um eitt bygning til sjúklingahotel. Hetta tilboð varð lagt fyri Føroya Landsstýri, men svar kom ongantíð úr landsstýrinum um hetta tilboð.

Eftir áheitan frá einum felagsstýrisfundi á heysti í 1996 bevur sjúkrahússtjórin kannað, um tilhoðið hjá Ríkissjúkrahúsinum framvegis var galdandi. So er ikki.

Hetta eru einastu støkiligu kanningar, landsstýrismanninum vitandi, ið eru gjørdar viðvíkjandi nýggjum leigumøguleikum fyri Hotel Tórshavn.

að sp. 6. Tá ið landsstýrið í 1996 undirskrivaði ein tiggju ára sáttmála, er tað óivað tí, at landsstýrið tá metti, hesi høli vera egnaði at hýsa føroyskum sjúklingum.

Tað er sjálvandi einki at ivast í, at hesi høli á mangan hátt kundu verið betri, men innanfyri tann karm, ið avsettur er til sjúkrahúsverkið, verður mett, at høltini eru nýtilig.

Bæði læknarnir á Ríkissjúkrahúsinum og innan føroyska sjúkrahúsverkið kenna og eru vitandi um høltini á Hotel Tórshavn. Hotel Tórshavn verður tí ikki nýtt til sjúklingar, sum vera mettir ov sjúkir at búgva har. Aðrir møguleikar eru t.d. patienthotellið hjá Ríkissjúkrahúsinum, og í einstøkum føri hevur sjúkrahúsverkið funnið annan bústað til føroyskar sjúklingar.

100-4 Fyrispurningur til Sámal Petur í Grund, landsstýrismann, um møguleikarnar hjá føroyingum at fáa inntøkur burturúr eftirlitinum við føroyska luftrúminum

Ár 1997 miðvikudagin 8. oktober: boðaði formaðurin frá omanfyri nevnda fyrispurningi frá Bjarna Djurholm, løgtingsmanni, sum var saljóðandi

1) Hvussu langt er landsstýrið komið í kanningunum at tryggja føroyingum ábyrgdina av eftirlitinum við flogferðsluni í føroyska luftrúminum?
2) Hvørjar treytir á flogvallaøkinum skulu lúkast (vallarlongd, breidd o.s.fr.) fyri at kunna átaka okkum ábyrgdina av føroyska luftrúminum og fáa inntøkur burturúr?
3) Hvussu stórar inntøkur kann samfelagið fáa av eftirlitinum við luftrúminum?
4) Hvørjar inntøkur kundi samfelagið fingið úr at hava ein 2.200 m langan flogvøll sum "trygdarbreyt" í Norðuratlantshavi?

Viðmerkingar

Fyri fáum árum síðani setti landsstýrið sær fyri at kanna møguleikarnar at fáa part av tí gjaldi, ið flogfør rinda, sum flúgva í føroyska luftrúminum. Endamálið var at fáa greiðar á, um føroyingar kundu átikið sær eftirlitið við sivilu flogferðsluni í føroyskum øki.

Sum úrslit av hesi ætlan varð nevnd sett at kanna málið, og skrivaði nevndin frágreiðing, sum staðfesti, at møguleikar skuldu verið at fingið nakað burturúr flogferðsluni.

Eftirlitið við føroyska luftrúminum er regulerað samstarvi altjóða ásetingum.

Á okkara leiðum eru tað íslendingar, sum veita neyðugu loftferðslutænastuna fyri tey flogfør, sum flúgva í okkara luftrúmi.

Umb. 60.000 flogfør flúgva í íslendska ábyrgdarøkinum árliga. Tey flestu fara um føroyska luftrúmið. Íslendingar fáa fast gjald fyri hvørt flogfar, sum flýgur í hesum øki.

Ein av fortreytunum fyri at fáa rættin at røkja egið loftrúm er møguleikin at kunna bjóða fram ein flogvøll, sum lýkur altjóða ásett krøv um longd, breidd, osfr.

Tað er neyðugt, at vit fáa greiðar á, um føroyingar kunnu líta inntøkur úr luftrúminum um oyggjarnar. Eisini er neyðugt at fáa staðfest, hvørjar fortreytir á flogvallaøkinum, vit skulu lúka til tess at kunna átaka okkum loftferðsluábyrgdina í egnum luftrúmi.

Í svari til fyrispurning í juni 1995 boðaði landsstýrismaðurin í samferðslumálum frá, at hann arbeiddi við ætlanunum um at tryggja føroyingum part av inntøkunum fyri sivilari flúgving í føroyska loftrúminum, og at fyritreikingar vóru í gongd í málinum.

Málið er stórt og týdningarmikið, og verður tí hesin fyrispurningur settur landsstýrismanninum í samferðslumálum.

10. oktober 1997 varð við 20-0-1 atkvøðum samtykt, at fyrispurningurin skuldi svarast.

7. november 1997 svaraði Sámal Petur í Grund, landsstýrismaður, fyrispurningunum soleiðis:

Stutt frágreiðing um málið
Sivila flogferðslan í loftrúminum yvir Føroyum liggur undir íslendskari umsiting og eftirliti í einari altjóða ásetta FIR (Flight Information Region) nevnd 'Reykjavik FIR', sum er avtalað undir ICAO-samstarvinum. ICAO er altjóða felagsskapurin fyri sivilari flogferðslu.

Tá tosað verður um at yvirtaka eftirlitið við føroyska loftrúminum, so kann hetta merkja, antin at stovnað verður ein føroysk FIR, ella at føroyingar yvirtaka flest møguligar av teimum uppgávum, sum íslendingar nú taka sær av viðvíkjandi 'føroyska partinum' av 'Reykjavik FIR'.

Verður fyrra loysnin vald við stovnan av egnari 'Torshavn FIR', so skal ein rættiliga stór føroysk skipan byggjast upp, umfatandi flúgvileiðarar, veðurfrøðiligar skipanir og radareftirliti v.m. Uppi í hesi loysn vildi spurningurin um yvirtøku av radarstøðini á Sornfelli eisini stungið seg upp. Ein stórur trupulleiki við eini tílíkari føroyskari ætlan er, at tað er altjóða felagsskapurin ICAO, sum skal samtykkja eina møguliga stovnan av føroyskari FIR. Eftir teim upplýsingum vit hava fingið frá danska ferðslumálaráðnum, so arbeiðir ICAO nú við at minka um talið á sjálvstøðugum FIR-um, bæði orsakað av ynskjum um ein opnari marknað á hesum øki, og orsakað av tøkniligu menningini við samskifti og eftirsing við hjálp av fylgissveinum, sum ger tað møguligt at hava større øki í einari FIR.

Hugsast kann, at tað er ein gongd leið at royna at arbeiða við tí miðnu loysnini, har vit yvirtaka tænastuna innan føroyska loftrúmið innan íslendsku FIR-ina. Hetta vil viðføra minni bygnað, manning, útgerð o.a., og kann ein slík loysn møguliga verða stovnsett við avtalu fyrst og fremst millum Danmark/Føroyar og Ísland, ið síðani bara skal hava eina formliga góðkenning í ICAO.

Viðv. spurningi 1, so hevur ein arbeiðsbólkur hjá landsstýrinum 2. juni 1994 lagt fram eina niðurstøðu, har bólkurin mælir til »at beita á danska trafikministaran um at arbeiða fyri, at loftferðslutænastur fyri yvirflúgvingar gjøgnum føroyskt loftrúm skulu gerast í Føroyum, annaðhvørt soleiðis, at føroyingar fáa formligu ábyrgdina og leiðsluna á økinum, ella í øðrum lagi soleiðis, at føroyingar skulu standa fyri tí praktiska arbeiðinum, sum sostatt verður skipað undir íslendskari leiðslu.«

Eisini mælir bólkurin í sama viðfangi til, »at samráðingar verða tiknar upp við NATO um, at eitt føroyskt felag yvirtekur tekniska raksturin av NATO-støðini á Sornfelli«.

Í november 1995 var undirritaði á fundi við danska ferðslumálaráðharran Jan Trøjborg, har spurningurin um yvirtøku av tænastuveitingum í sambandi við yvirflúgving gjøgnum føroyskt loftrúm varð viðgjørdur. Daniir høvdu tá ikki nakra avgjørda støðu til málið, men vístu á, at sjálvt eitt skipan við føroyskum rakstri av tí føroyska partinum av íslendsku FIR-ini krevur góðkenning frá ICAO.

Á vitjan á íslendsku flogleiðslustøðini á Guvunesi í mai 1996 váttaðu íslendingar tað, sum vit áður hava fingið boð um skrivliga, nevniliga, at gjøldini fyri loftferðslutænastuna í samband við ábyrgd av íslendska og føroyska loftrúminum einans eru endurgjald fyri faktiskar útreiðslur av tænastuveitingunum.

Viðv. spurningunum 2-4, so hevur Vinnumálastýrið vent sær til Statens Luftfartsvæsen (SLV) hesum viðvíkjandi. Landsstýrismaðurin kann væntandi svara fyrispurninginum frá Bjarna Djurholm nærri, tá svar fyriliggur frá SLV.

100-5 Fyrispurningur til Edmund Joensen, løgmann viðv. broti á lógina um javnstøðu millum kvinnur og menn

Ár 1997, hósdagin 9. oktober, boðaði fyrrnaðurin frá umaofyri nevnda fyrispurningi frí Martin Petersen, løgtingsmanni, sum var soljóðandi

1. Hvat hevur landsstýrið gjørt fyri at rætta tey brot á § 8, stk. 1, 1. pkt. í lóg nr. 52 frá 3. mai 1994 um javnstøðu millum kvinnur og menn, sum kanningarstjórin í frágreiðing frá 15. september 1997 staðfestir eru hend í 8 førum í sambandi við val av limum í nevndir á heysti 1995?
2. Hvussu eru hesar nevndir mannaðar í dag:
   Menningargrunnur Íðnaðarins,
   Sjónvarpsnevndin,
   Útvarpsnevndin,
   Nevndin, sum varðar av Suðuroya Sjúkrahúsi,
   Jarðaráðið,
   Býarskipanarnevndin,
   og hvørji umboð hevur landsstýrið valt í nevndina fyri Landsbanka Føroya?
3. Hvørjar nevndir, ráð v.m. hevur landsstýrið og stovnar undir landsstýrinum sett, síðani Javnstøðunevndin klagaði landsstýrið til Landsstýrismálanevndina (7. februar 1996), og hvør situr í hesum nevndum, ráðum v.m.?
4. Hvørjar mannagongdir nýtir landsstýrið, tá nevndir í fyrisitingarligum hopi verða settar, so trygd er fyri, at § 8, stk. 1 í lógini um javnstøðu millum kvinnur og menn verður hildin?

Viðmerkingar

Í mai mánaði 1994 kom lóg um javnstøðu millum kvinnur og menn í gildi í Føroyum, og § 8 í hesi lóg er soljóðandi:

»Stk. 1. Allar almennar nevndir, ráð, umboð og líknandi, sum fyrisitingarvaldið tilnevnir, skulu vera sett saman soleiðis, at umleið eins nógvir limir av báðum kynum eru umboðaðir. Sama er galdandi fyri tær nevndir, ráð, umboð og líknandi, sum løgtingið og býa- og bygdaráðini tilnevna, tá ið tey, ið tilnevnast skulu, ikki nýtast at vera løgtings- ella býráðslimir.

Stk. 2. Tá ið serligar grundir eru fyri tí, kann Javnstøðunevndin geva undantaksloyvi í hvørjum einstøkum føri ella fyri eina yrkisgrein sær.«

Á heysti 1995 valdi landsstýrið limir í meira enn 30 nevndir, ráð v.m., og í sambandi við hesi val var Javnstøðunevndin av teirri áskoðan, at landsstýrið í fleiri førum ikki hevði fylgt ásetingini í § 8, stk. 1 í lógini um javnstøðu millum kvinnur og menn, um at umleið eins nógvir limir av báðum kynum skulu vera umboðaðir. Tá eitki kom burtur úr at venda sær til landsstýrið, klagaði Javnstøðunevndin í februar 1996 landsstýrið til Landsstýrismálanevndina fyri brot á javnstøðulógina.

Løgtingsformaðurin setti kanningarstjóra at kanna málið, og í september 1997 kom frágreiðing, har kanu-

løgarstjórin staðfestir, at landsstýrið í 8 førum framdi brot á § 8, stk. 1, í løgtingslóg nr. 52 frá mai 1994 um javnstøðu millum kvinnur og menn, tá tað í september og oktober 1995 valdi limir í nevnd, ráð v.m.

Í sambandi við kanning av hesum máli hevur landsstýrið greitt kanningarstjóranum frá tvipulleikunum, tá allar hesar nevndir skuldu mannast. »Tað var eitt innviklað »puslispæl«, har hædd skuldi takast fyri viðurskiftum millum samgongu og andstøðu, umframt millum teir ymsu flokkarnar.« siga landstýrismenn fyri kanningarstjóranum, og siga teir, at annars var høvuðsprinsippið, at verandi nevndarlimir halda áfram, um teir annars uppfylla treytirnar.

Eisini hevði tað ávirkan á nevndarvalini tá, at nakrar nevndir skuldu takast av. Í teimum førum var sama nevnd vald aftur. Harafturat kom, at skálbráið var stutt at velja tær nógvu nevndirnar.

Grundgevingarnar hjá landsstýrinum eru væl skiljandi. Tað, sum tí kann sykjast løgið, er, at landsstýrið ikki søkti um undantak sambært § 8, stk. 2 frá ásetingunum í § 8, stk. 1 í teimum førum, tað ikki eydnaðist at seta nevndina rætt saman.

Hóast tvipulleikarnir hjá landsstýrinum eru skiljandi, so ber ikki til at góðtaka, at lógarbrotini ikki verða rættað.

Kanningarstjórin hevur viðgjørt klaguna, sum snýr seg um nevndarvalini í september og oktober 1995, og tí verður einki sagt í frágreiðingini um, hvat er hent síðani. Tað er av áhuga fyri bæði løgting og almenning at fáa at vita, um landsstýrið hevur rættað lógarbrotini, og hvussu nevndirnar nú eru mannaðar.

Og almennar nevndir eru settar síðani tá. Vit hava frætt um fleiri nevndir settar av landsstýrinum, sum ikki fylgja ásetingunum í § 8, stk. 1 í javnstøðulógini. Tó hevur landsstýrið hroytt mamningina í nevndini, sum skal gera uppskot til nýggja skipan við ES. Hvat hent er við hinum báðum nevndunum, og hvat við øðrum nevndum, tað vita vit ikki.

Øll byrjan er tvipul, eisini tann at velja nevndir, ráð v.m., har menn og kvinnur eru javnt umboðað. Tað er tí av áhuga hjá okkum at fáa at vita, hvussu landsstýrið ber seg at fyri at tryggja, at kynini bæði eru javnt umboðað í nevndum og ráðum.

Fyrispurningurin verður settur løgmanni, hóast fleiri ella tær flestu av almennu nevndunum verða settar av teimum einstøku landsstýrismonnunum. Grundin til hetta er, at javnstøða millum kynini er ein meginregla, sum fevnir um flest øll málsøki, og tað er løgmaður sum leiðari fyri stjórnini, sum hevur ábyrgdina av javnstøðupolitikki landsstýrisins, og sum skal tryggja, at landsstýrið ikki fremur lógarbrot.

10. oktober 1997 varð við 20-0-1 atkvøðum samtykt, at fyrispurningurin skuldi svarast.

26. november 1997 svaraði løgmaður fyrispurningunum soleiðis:

ad. 1:
Landsskúlaráðið, sum er ein av teimum 8 nevndunum, ið eru fevndar av niðurstøðu kanningarstjórans, er ikki til longur.

Menningargrunnur Ídnaðarins hevur fingið nýggja nevnd og lýkur nú treytirnar í javnstøðulógini.

Nevndin, sum varðar av Suðuroyar Sjúkrahúsi, og sum er umrødd í frágreiðing kanningarstjórans, varð avtikin á ólavsøku 1996.

Við Suðuroyar Sjúkrahús situr nú eitt sjúkrahúsráð. Ráðið er mannað við trimum kvinnum og tveimum monnum.

Í skrivi til løgmann, dagfest tann 3. november 1997, hevur landsstýrismaðurin í kommununmálum boðað frá, at tey fýra umboðini í Býarskipanarnevndini, ið hann velur, beinanvegin verða vald av nýggjum, soleiðis at í minsta lagi 2 av hesum verða kvinnur, og at hann fer at biðja Føroya Kommunufelag, sum skal velja 2 limir, um at velja av nýggjum, soleiðis at annar av hesum limum verður kvinna. Tá hetta er gjørt, lýkur Býarskipanarnevndin ásetingarnar í javnstøðulógini

Útvarps- og Sjónvarpsnevndin eru umskipaðar, og líka tær nú ásetingarnar í javnstøðulógini.

Í skrivi til løgmann, dagfest tann 30. oktober 1997, hevur Vinnumálastýrið boða frá, at tað er farið undir at velja Jarðarráðið av nýggjum, soleiðis at tað lýkur ásetingarnar í javnstøðulógini.

Av 11 limum í umsjónarráðnum í Landsbankanum velur landsstýrið 5, meðan 6 verða vald av vinnufeløgum.

Í skrivi til løgmann, dagfest tann 31. oktober 1997, hevur landsstýrismaðurin í fíggjarmálum upplýst, at tað er sera truplut at velja umsjónarráðið fyri Landsbankan. Sjálvt um landsstýrið tann 28. august 1995 valdi fýra menn og eina kvinnu í ráðið fyri Landsbankan, vórðu umboðini fyri vinnufeløgini ikki vald fyrr enn 5. november 1996.

Landsstýrismaðurin í fíggjarmálum skjýtur tí upp, at umsjónarráðið fyri Landsbankan verður sitandi valskeiðið út, og at javnstøðulógin verður fylgd, tá ið umsjónarráðið verður valt av nýggjum.

ad. 2:
Niðanfyri nevndu nevndir og ráð eru soleiðis mannað í dag:

Mentningargrunnur Ídnaðarins
Nevnd: Tveir menn og eitt kvinna.
Tilvakstimir: Tveir menn og ein kvinna

Sjónvarpsnevndin
Nevnd: Tríggir menn og tríggjar kvinnur
Tilvakstimir: Tríggir menn og tríggjar kvinnur

Útvarpsnevndin
Nevnd: Tríggir menn og tríggjar kvinnur
Tilvakstimir: Tríggir menn og tríggjar kvinnur

Ráðið fyri Suðuroyar Sjúkrahús
Nevnd: Tríggjar kvinnur og tveir menn
Tilvakstimir: Ein kvinna og ein maður

Jarðarráðið
Nevnd: Fimm menn
Tilvakstimir: Fimm menn.

Býarskipanarnevndin
Nevnd: Sjey menn

Landsbankl Føroya
Limir í umsjónarráðnum, ið eru valdir av landsstýrinum: Fýra menn og ein kvinna

Ad 3.
Í tíðarskeiðinum 7. februar 1996 - 11. juni 1996, tá ið sitandi samgonga varð umskipað, valdi landsstýrið hesar nevndir:

Nevnd at gera uppskot til stuðul til menning av fiskivinnu á landi og heildarætlan fyri innfluttan fisk
Nevnd: Fimm menn og ein kvinna.
Nevndin varð liðug við arbeiðssetning sín í mai 1996.

Val av likningarráð
Tvær kvinnur og ein maður.

Val av nevndarlimum í kommununevndina
Nevnd: Fýra menn og tvær kvinnur.

Val av nevnd til endurskoðan av inntøkutrygdini
Nevnd: Átta menn.
Tiltakslimir: Fýra menn.

Nevndin, ið er vald sambært uppskoti frá vinnufeløgunum, skuldi ætlandi vera liðug við arbeiði sítt í 1996. Sambært upplýsingum frá fiskivinnudeildini verður nevndin væntandi liðug í ár.

Í tíðarskeiðinum frá 11. juni 1996, tá ið samgongan varð umskipað, og higartil hava landsstýrismenn og løgmaður valt niðanfyristandandi nevndir:

Val av limum í kappingarráðið
Nevnd: Tveir menn og tvær kvinnur
Tiltakslimir: Fýra menn

Val av limum í stýrið fyri Vakstrarhúsgrunnin
Nevnd: Tveir menn og ein kvinna
Tiltakslimir: Tveir menn og ein kvinna.

Val av KT- nevnd
Nevnd: Seks menn

Nevndin skal vera liðug við arbeiði sítt tann 15. desember í ár. Landsstýrismaðurin í undirvísingar-málum hevur upplýst, at hann hevur søkt Javnstøðunevndina um undantak frá ásetingunum í javnstøðulógini. Javnstøðunevndin hevur enn ikki svarað umsóknini.

Val av Granskingarráð Føroya
Nevnd: Tríggjar kvinnur og tveir menn

Val av nevnd at gera útbúgvingarpolitikk
Nevnd: Seks menn og tvær kvinnur

Val av nevnd at gera uppskot til nýggja læraraútbúgvingarlóg
Nevnd: Fimm menn og ein kvinna

Í skrivi til løgmann, dagfest tann 6. november 1997, hevur landsstýrismaðurin í undirvísingarmálum upplýst, at hann fer at taka stig til at umskipa nevndina at gera útbúgvingarpolitikk og nevndina, ið skal gera uppskot til nýggja læraraútbúgving soleiðis, at tær lúka treytirnar í javnstøðulógini.

Val av arbeiðsbólki at endurskoða ÚS- skipanina
Nevnd: Tveir menn og ein kvinna

Val av limum í ráðið fyri Landssjúkrahúsið
Nevnd: Tríggir menn og tvær kvinnur
Tiltakslimir: Ein maður og ein kvinna

Val av limum í ráðið fyri Suðuroyar Sjúkrahús
Nevnd: Tríggjar kvinnur og tveir menn
Tiltakslimir: Ein kvinna og ein maður

Val av limum í ráðið fyri Klaksvíkar Sjúkrahús
Nevnd: Tríggjar kvinnur og tveir menn
Tiltakslimir: Ein kvinna og ein maður

Stýrið fyri Arbeiðsmarknaðareftirlønargrunnin
Nevnd: Tveir menn og tvær kvinnur

Ráðið fyri arbeiðsumhvørvi
Nevnd: Sjey menn og seks kvinnur

Stýrið fyri ALS
Nevnd: Fýra menn og tríggjar kvinnur
Tiltakslimir: Fimm menn og ein kvinna

Her skal viðmerkjast, at undantaksloyvi varð lingið frá Javnstøðunevndini, tá stýrið varð valt.

Skipanarnevndin
Nevnd: Sjey menn
Tiltakslimir: Seks menn

Nevnd í samband við avreiðing og innvigan av fiski í Føroyum
Nevnd: Nýggju menn

Nevnd fyri forskotsgrunn fiskiflotans
Nevnd: Tríggir menn
Tiltakslimir: Tríggir menn

Nevnd til umlegging av lánum v.m. hjá fjarfiskiflotanum
Nevnd: Tríggir menn.

Landsstýrismaðurin í fiskivinnumálum hevur í skrivi, dagfestum tann 20. oktober 1997, boðað løgmanni frá, at hann fer at taka stig til at velja nevndina, soleiðis at hon lýkur ástingarnar í javnstøðulógini.

Yrkisráð viðv. inntøkutrygd
Nevnd: Fimm menn
Tiltakslimir: Fýra menn

Nevndin til endurskoðan av sjóvinnulógunum
Nevnd: Nýggju menn.

FAS nevndin
Nevnd: Sjey menn

Sjóvinnuráðið
Nevnd: Ellivu menn

Forsmunisnevndin
Nevnd: Tveir menn og ein kvinna

Filmseftirlitið
Nevnd: Tveir menn og ein kvinna

Nevnd at gera uppskot til samráðingar við ES
Nevnd: Fýra menn og tríggjar kvinnur.

Haraftrat kann upplýsast at samtlaert kunngerð nr. 137 frá 19. september 1997 eru løgtingsvalnevndirnar valdar av nýggjum, og lúka tær nú ásetingarnar í javnstøðulógini.

Ad 4.
Málið um javnstøðulógina hevur fleiri ferðir verið umrøtt á landsstýrisfundum. Aðrenn frágreiðingin frá kanningarstjóranum varð altjannakunngjørd, varð tó ávísur ivi um, hvussu reglurnar í § 8 skulu tulkast.

Aftaná, at kanningarstjórin hevur staðfest, at § 8 í javnstøðulógini skal skiljast í breiðasta týdningi, er hesin ivi burtur.

Í skrivi dagfest tann 7. oktober 1997 hevur Javnstøðunevndin skotið upp, at nevndin kundi bugsað sær eina fasta mannagongd, tá ið landsstýrið setir nevndir, og at rættast varð, at nevndin sum eftirlits-myndugleiki fekk eina beinleiðis kunnan frá landsstýrinum í teimum førum, tá ið ivi er um, hvørt ein nevnd kemur undir ásetingarnar í javnstøðulógini.

Løgmaður hevur boðað Javnstøðunevndini frá, at hann tekur undir við hesum sjónarmiði, og løgmaður fer at boða Javnstøðunevndini til fundar í næstum lyri at leggja eina fasta mannagongd til rættis, tá ið landsstýrið velur nevndir, soleiðis at eingin ivi skal vera um, at reglurnar í javnstøðulógini framvegis verða hildnar, tá landsstýrið velur nevndir.

100-6 Fyrispurningur til Anfinn Kallsberg, landsstýrismann viðv. trygdini fyri frítíðarpeningi, sum stendur í føroyskum peningastovnum

Ár 1997, hósdagin 9. oktober, boðaði formaðurin frá omanfyri nevnda fyrispurningi frá Ingeborg Vinther løgtingsmanni, sum var soljóðandi

Landsstýrismaðurin verður biðin um at greiða frá, hvørji stig landsstýrið hevur tikið fyri at tryggja, at frítíðarpeningur hjá føroyskum løntakarum, sum stendur í føroyskum peningastovnum verður fulltryggjaður við lógini um innsetaratrygdargrunn.

Eisini verður landsstýrismaðurin biðin um at greiða frá, hvørji útlit, hann metir, eru til, at ríkisnyndugleikarnir taka undir við einum tilmæli um, at frítíðarpeningur verður fulltryggjaður í innskjótaratrygdargrunninum.

Viðmerkingar
Í viðmerkingunum til løgtingsmál nr. 96 frá 1995 um at seta í gildi fyri Føroyar lógina um innsetaratrygdargrunn verður upplýst, at frá føroyskari síðu er ynskiligt, at veittur verður fullur fulnaður fyri frítíðarpeningi, sum í Føroyum stendur í peningastovni.

Víðari verður sagt í viðmerkingunum, at landsstýrið hevur fyrr vent sær til innsetaratrygdargrunnin við málinum, men vurð ynski landsstýrisins ikki gingið á møti.

Landsstýrismaðurin viðmerkir í hesum sambandi, at heldur enn at útseta ígildiskomuna fyri lógini, er ætlanin at reisa spurningin um frítíðarpeningin gjøgnum ríkisumboðið.

Fyri løgtingið, fakfeløgini og ikki minst løntakararnar er tað sera umráðandi, at frítíðarpeningurin beinanvegin verður tryggjaður, og eg væntí tí, at landsstýrismaðurin kann greiða frá tí samskifti, sum hevur verið við ríkisumboðið um hetta spurning.

10. oktober 1997 varð við 21-0-0 atkvøðum samtykt, at fyrispurningurin skuldi svarast.

6. november 1997 svaraði Anfinn Kallsberg, landsstýrismaður, fyrispurningunum soleiðis:

Harra formaður.
Ingeborg Vinther løgtingskvinna hevur sett mær fyrispurning viðvíkjandi trygdini fyri frítíðarpeningi, sum stendur í føroyskum peningastovnum.

Sum tað er nevnt í viðmerkingunum til fyrispurningin stendur í viðmerkingunum til løgtingsmál nr. 96 1995 um at seta í gildi fyri Føroyar lógina um innsetaratrygdargrunn, at tað er eitt ynski frá føroyskari síðu, at veittur verður fullur fulnaður fyri frítíðarpeningi, sum stendur í peningastovni í Føroyum.

Men heldur enn at útseta ígildiskomuna fyri lógina, varð avgjørt at reisa spurningin um frítíðarpeningin gjøgnum ríkisumboðið, tí landsstýrið roknaði við, at tað kundi koma at taka tíð at viðgera málið.

Løgtingið samtykti við endaligum av tingsetuni 1995 at seta donsku lógina um innsetaratrygdargrunn í gildi fyri Føroyar, og málið gekk sína vanligu gongd til landsstýrið, sum í skrivi dagfest 17. juli 1996 sigur ríkisumboðsmanninum frá, at løgtingið hevði samtykt, at lógin kundi setast í gildi fyri Føroyar við teimum broytingum, sum løgtingið hevði samtykt.

Í sama bræv var skrivað, eitur:

»Somuleiðis heitir landsstýrið á ríkisumboðsmannin um at taka spurningin við donsku myndugleikarnar um, at innsetaratrygdargrunnurin veitir fullan fulnað fyri frítíðarpening, sum stendur í føroyskum peningastovnum.« (Avrit av løgtingsmálinum varð hjálagt).

Ríkisumboðið sendi málið víðari til vinnumálaráðið, sum málið tá hoyrdi undir.

Men lógin er ikki lýst at galda í Føroyum enn.

Landsstýrið hevur fleiri ferðir spurt ríkisumboðið, hvussu gongur við málinum og um útlitini fyri, at føroyska ynski verður gingið á møti.

Í skrivi, dagfest 24. oktober 1997, frá ríkisumboðnum framgongur, at fíggjareftirlitið við ársskiftið 1996/97 varð flutt undir búskaparmálaráðið og harvið eisini hetta málið.

Í hesum tíðarbilinum sær út til, at málið er vorðið burtur, og ríkisumboðið hevur 28. maj 1997 sent búskaparmálaráðnum alt tilfarið av nýggjum.

Hóast áminningar bæði frá landsstýrinum og ríkisumboðnum hevur landsstýrið ikki enn fingið nakað svar uppá, hvussu langt málið er komið, og hvørji útlit eru fyri, at føroyska ynski um, at innsetaratrygdargrunnurin veitir fullan fulnað fyri frítíðarpeninginum, sum stendur í føroyskum peningastovnum, vinnur frama.

100-7 Fyrispurningur til Ríkisumboðsmannin viðv. tulkingini av heimastýrislógini og rættindini til ráevnini í undirgrundini

Ár 1997, fríggjadagin 10. oktober, boðaði formaðurin frá omanfyri nevnda fyrispurningi frá Bjarna Djurholm, løgtingsmanni, sum var soljóðandi

1. Hvussu tulkar ríkisstjórnin heimastýrislógina:
a) eftir avtaluteoriini, t.e., har medvirkan krevst frá bæði heimastýri og ríkismyndugleikunum at seta hana úr gildi? Hvussu verður grundgivið fyri tulkingini?
b) eftir delegatiónsteoriini, t.e., sum vanlig ríkislóg, sum kann setast úr gildi einvegis av ríkismyndugleikunum? Hvussu verður grundgivið fyri tulkingini?
2. Hvønn metir ríkisstjórnin hava evsta valdið yvir ráevnunum í føroysku undirgrundini - heimastýrið ella ríkismyndugleikarnar?

Viðmerkingar

11. september 1992 samdust ríkisstjórnin og landsstýrið (javnfl. og fólkafl.) um, at heimastýrið skuldi yvirtaka ráevnini í undirgrundini.

Longu í 1948 samtykti løgtingið, at samráðingar skuldu vera við ríkisstýrið um yvirtøku av ráevnunum í undirgrundini. Í 1975 samtykti løgtingið, at málsøkið skuldi yvirtakast sum sermál.

Hóast hesar samtyktir spurdist lítið burturúr, tí skiftandi danskar stjórnir meintu, at henda yvirtøka fór at ganga ríkiseindini ov nær.

Í 1981 valdi løgtingið eina 3-mannanevnd at umboða Føroyar í samráðingum við danir um undirgrundina. Fundirnir millum partarnar endaðu úrslitaleysir, tí eingin semja fekst um samráðingargrundarlagið.

Aftaná, at løgfrøðingar høvdu kannað, hvørjar løgfrøðiligar forðingar vóru fyri eini yvirtøku, vóru aftur í 1986 fundir við ríkisstjórnina um málið. Heldur ikki á hesum fundum kom nakað burturúr.

Landsstýrið setti eina nýggja nevnd at kanna, hvussu heimastýrið kundi yvirtaka málsøkið. Tá nevndin varð liðug við arbeiðið, vóru aftur fundir við stjórnina um málið. Úrslitið av hesum fundum var, at stjórnin góðkendi, at málsøkið kundi yvirtakast sum sermál, og varð semja um at seta blandaða nevnd at koma við uppskoti um rammulóg og eina avtalu um yvirtøkuna.

Stígur kom í nevndararbeiðið um ársskiftið 1991/92. Politiskar samráðingar vóru tí tiknar upp millum landsstýrið og stjórnina, sum endaðu við tí óvæntaða úrslitinum, at stjórnin brádliga skifti støðu og bjóðaði føroyingum at yvirtaka ráevnini í undirgrundini sum sermál.

Samboðið avtaluni um yvirtøkuna av ráevnunum í undirgrundini, sum er dagfest 22. desember 1992, var yvirtøkan ikki uttan treytir. M.a. verður staðfest, at

> *»regeringen har konstateret, at Færøernes landsstyre er indstillet på, til gavn for såvel færøske som danske erhvervsinteresser, forudsat konkurrenceevnighed, at anvende sagskundskab indenfor dansk forvaltning og forskning samt danske erhvervsvirksomheder i den færøske råstofudvinding.«*

Í protokollatinum frá samráðingarfundinum frá fundinum millum landsstýrið (javnaðar- tjóðveldis- og sjálvstýrisflokkin) og stjórnina 12. oktober 1993 er undirgrundin aftur á kolti. Har verður m.a. sagt, at landsstýrið eftir avtaluni frá 22. desember 1992 »tilkendegiver... at være indstillet på«, at sakkunnleiki innan danska gransking, umsiting og vinnufyritøkur skulu upp í ráevnisútvinningina. Eisini verður lagt aftrat, "at landsstyret og regeringen vil snarest i fællesskab overveje udmøntningen heraf."

Aftur undir samráðingunum millum landsstýrið (sambands- javnaðar- verkamannafylking og sjálvstýrisflokkin) og stjórnina 17. november 1994 er undirgrundin á lofti. Her er ein formulering um, at donsk gransking, umsiting og vinnulívsáhugamál skulu vera við. Hetta eru landstýrið og stjórnin »fortsat enige om«. Eisini verður sagt, at danskar ráðharrastovur og stýri, eftir avtalu við landsstýrið, velja serfrøðingar, sum kunnu luttaka í »landsstyrets udredningsarbejde på kulbrinteområdet«. Haraftrat skal stjórnin eggja donskum fyritøkum at fara upp í leitingina eftir olju og gassi.

Føroyskir politikarar hava eisini givið lyfti um, at inntøkur frá eini komandi oljuvinnu skulu hava við sær samráðingar um at minka blokkstuðulin til Føroyar. Hetta verður m.a. staðfest í protokollatinum frá 12. oktober 1993. Eisini var tá semja um, at tað er ætlanin hjá stjórnini, at ein partur av oljuinntøkunum skulu minka um »eventuel udestående restgæld på statslån, som er bevilget landsstyret i forbindelse med genopretning af de færøske bankers og landskassens økonomi«.

Í felagsyvirlýsingini aftaná samráðingarnar millum landsstýrið og stjórnina 3. november 1995, er einki nevnt um ráevni í undirgrundini. Løgmaður hevur síðani haft á lofti, at undanfarna yvirlýsing frá 7. november 1994 fór úr gildi við nýggju yvirlýsingini 3. november 1995. Sambært hesi tulking vóru sostatt allar bindingar á ráevnisøkinum burtur. Sambært Dómnalætting nr. 42, 1996 er hesda tulking skeiv. Blaðið vendi sær til forsætilmálaráðið og fekk staðfest frá Steen Rye Larsen, skrivstovustjóra, at tað, sum føroyingar bundu seg til frá 22. desember 1992 til 17. november 1994, framvegis hevur fult gildi. Harafturat sigur skrivstovustjórin í svari sínum til blaðið, at »yvirlýsingin frá 17. november 1994 supplerar avtaluna frá 1992, og tilsamans gevur hetta grundarlagið undir tí, sum Føroyar og Danmark hava avtalað um undirgrundina. Tað vil við øðrum orðum siga, at tey lyfti, sum skiftandi landsstýri hava givið skiftandi stjórnum um olju og undirgrund, standa við makt.« Hetta er ein áhugaverd, men ikki sørt ørkymlandi staðfesting, tí við atliti at avtalum um yvirtøkuna av ráevnunum í undirgrundini frá 22. desember 1992 og øllum semjunum, gjørdar eru millum skiftandi landstýri og donsku stjórnina síðani, har ráevnini í undirgrundini og møgulig framleiðsla hava verið viðgjørd og ferð eftir ferð nágreinað, er tað nú ein spurningur, um Føroya fólk veruliga hevur evsta valdið á ríkidømunum, sum møguliga eru í føroysku undirgrundini.

Ríkisrættarliga viðurskiftini millum Danmark og Føroyar eru skipað sambært heimastýrislógini. Vanliga fatanin hevur verið, at henda lógin tryggjar, at Føroyar eru ein sjálvstýrandi partur í einum ríkisfelagsskapi (sokallaða aftaleteorien), og at skipanin ikki kann broytast av danska løggávuvaldinum einsamalt, og enn minni av donsku stjórnini.

Síðani fyrstu kreppuna í 1992 er ivi tó sáddur um virðið av hesi tulking. Serstakliga tá vit staðfesta, at tað eisini finst ein heilt annar fatan av heimastýrislógini (delegationsteorien), sum er rótfest millum nógvar danskar politikarar og serstakliga embætismenn.

Sambært hesi fatan er heimastýrislógin at meta ájavnt við allar aðrar danskar lógir, og kann danska løggávu- og embætisvaldið blanda seg í føroysk viðurskifti sum teimum lýstir, tí føroyingum bert er latið upp í hendur at umsita landið fyri danir.

Verður hugt at avtalunum og yvirlýsingunum millum skiftandi landstýri og stjórnina mugu vit eisini ásanna, at delegatiónsteoriin er hon, sum hevur verið mest eydsýnd undir teimum krøvum og ásetingum, føroyskir politikarar hava fingið bjóðað og hava bundið seg at lýða.

Nú landsstýrið í næstum skal fyrireika seg til enn eitt samráðingarumfar við donsku stjórnina, er tað umráðandi frammanundan at fáa at vita, hvørja tulking av heimastýrislógini danska stjórnin heldur seg til. Tað er ein sannroynd, at tá á stendur, so tilskila danir sær rætt at tulka og tamba heimastýrislógina, sum teimum lýstir. Heldur ríkisstjórnin seg til sokallaðu avtaluteoritina, so er greitt, at tað kann gerast trupult at fáa semju við danir, tá gjørdu avtalur og felagsyvirlýsingar ikki eru í samsvari við býti millum ábyrgd og myndugleika, sum henda tulking av heimastýrislógini leggur upp til. Heldur stjórnin seg hinvegin til delegatiónsteoriina, sum eisini famu landstýrini hava stóðjað seg til, so kann ikki væntast annað, enn at avtalan/yvirlýsingin komandi verður eitt framhald av danska leistinum, skorin er fyri føroyingar síðan 6. oktober 1992.

Ein avgerandi spurningur, sum fer at stinga seg upp í næstum er yvirvaldsstøðurin á ræðunum í undirgrundini. Tað er neyðugt, at fáa greiðið á, hvussu treytirnar, undanfarin landstýri hava boygt seg fyri og hava skrivað undir, verða fataðar av stjórnini, dønum, tjóvnb. okt.avtaluna 1993 og seinni avtalum. Samtaers áðurnevnda skrivstovustjóra í forsætismálaráðnum, so eru øll lyfti, sum føroyingar hava skrivað undir, framvegis galdandi.

Tað eru nógvir ósvaraðir spurningar í viðurskiftunum Føroyar og Danmarkar ímillum. Hetta orsakar gitingar um viðurskifti, sum politiskt eru sera viðkomandi. Í viðmerkingunum eru lýst nøkur ivamál, sum eiga at verða svarað, áðrenn landsstýrið enn einaferð skal samráðast við stjórnina.

Undirritaði setti 3. apríl í 1997 løgmanni fyrispurning um sama evnið. Svarið frá løgmanni var sera stutt umframt og lítið avdúkandi. Tí verður roynt at fáa ríkisumboðsmannin at svara spurningunum, sum mugu metast at hava stóran týdning fyri framtíðarsamstarvinum millum Føroyar og Danmark.

29 oktober 1997 varð við 19-0-0 atkvøðum samtykt, at fyrispurningurin skuldi svarast.

16. januar 1998 svaraði Vibeke Larsen, ríkisumboðsmaður, fyrispurningunum soleiðis:

1. Hvorledes fortolker regeringen hjemmestyreloven:
a) efter aftaleteorien, d.v.s. hvor der kræves medvirken fra såvel hjemmestyret som fra rigsmyndighederne for at sætte den ud af kraft? Hvorledes begrundes fortolkningen?
b) efter delegationsteorien, dvs. som en almindelig rigslov, der kan sættes ud af kraft ved en ensidig beslutning fra rigsmyndighederne? Hvorledes begrundes fortolkningen?
2. Hvem mener regeringen har højhedsretten over råstofferne i den færøske undergrund - hjemmestyret eller rigsmyndighederne?

1. Hjemmestyreloven
Siden vedtagelsen af lov nr. 137 af 23. marts 1948 om Færøernes hjemmestyre har statsretskyndige beskæftiget sig med spørgsmålet, om en ændring eller ophævelse af hjemmestyreloven kan foretages ensidigt af rigsmyndighederne, eller om en ændring kræver hjemmestyrets medvirken.

Statsministeriet har hidtil haft den opfattelse, at hjemmestyreloven statsretligt kan ændres af Folketinget i overensstemmelse med proceduren i lovens § 7. Samtidig har der dog for ministeriet ikke været tvivl om, at loven politisk og moralsk betragtes som »en overenskomst« mellem Færøerne og Danmark, som ikke bør ændres ensidigt af de danske myndigheder uden hjemmestyrets samtykke.

På baggrund af spørgsmålets fortsatte behandling i den forfatningsretlige litteratur finder Statsministeriet ingen anledning til at tilslutte sig en enkelt af de fremsatte teorier. Hjemmestyreloven er efter ministeriets opfattelse under alle omstændigheder en lov af særlig karakter, hvilket allerede lovens særlige indledning gør klart. Der er fortsat for ministeriet ingen tvivl om, at loven politisk og moralsk betragtes som en overenskomst mellem Danmark og Færøerne, som ikke bør ændres ensidigt af de danske myndigheder uden samtykke fra hjemmestyrets organer.

2. Bestemmelsesretten over råstoffer i undergrunden
Ved aftale af 22. december 1992 mellem regeringen og Færøernes landsstyre overlog hjemmestyret som særanliggende sagsområdet »råstoffer i undergrunden«, jf. hjemmestyrelovens liste D pkt. 3. Dette indebar overtagelse af den lovgivende og administrative myndighed samt de med sagsområdet forbundne udgifter.

Der er ved aftalens indgåelse enighed mellem regeringen og landsstyret om, at overtagelsen ikke omfattede nogen del af statens »højhedsret« over den danske undergrund, som efter danske retsprincipper, fastslået i forbindelse med etableringen af den grønlandske hjemmestyreordning, ikke kan overdrages til en enkelt del af riget, dennes befolkning eller en hjemmestyremyndighed.

I aftaledokumentet af 22. december 1992 - efter aftalens seks punkter - indgår følgende konstatering: »Regeringen har konstateret, at Færøernes landsstyre er indstillet på, til gavn for såvel færøske som danske samfunds- og erhvervsinteresser, forudsat konkurrencedygtighed at anvende sagkundskab indenfor dansk forvaltning og forskning samt i danske erhvervsvirksomheder i den færøske råstofudvikling«. Spørgsmålet om hjemmestyrets behov for sagkyndig og forretningsmæssig bistand blev drøftet under forhandlingerne om en råstofordning. Hverken regeringen eller landsstyret ønskede, at det skulle indgå som et led i aftalen, at dansk sagkundskab skulle anvendes, eller danske virksomheder have fortrinsret i den færøske råstofudvikling.

I »Fælleserklæring fra møde den 17. november 1994 mellem regeringen og Færøernes landsstyre« oplyses: »Regeringen og landsstyret er fortsat enige om til gavn for såvel færøske som danske samfunds- og erhvervsinteresser, forudsat konkurrencedygtighed at anvende sagskundskab inden for dansk forvaltning og forskning samt i danske erhvervsvirksomheder i den færøske råstofudvikling, jf. aftale af 22. december 1992 mellem regeringen og landsstyret om råstoffer i undergrunden. På denne baggrund er regeringen indforstået med, at ministerier og styrelser efter aftale med landsstyret udpeger eksperter, der kan deltage i landsstyrets udredningsarbejde på kulbrinteområdet. Bistand ud over det hidtidige omfang omkostningsdækkes. Regeringen opfordrer danske selskaber til at gå ind i efterforskning efter olie og gas på det færøske område på forretningsmæssig basis.« Regeringens tilsagn om at stille dansk sagkundskab til rådighed for udredningsarbejdet på kulbrinteområdet skete efter anmodning fra landsstyret.
Aftalen i Fælleserklæringen ændrer ikke aftalen af 22. december 1992 om råstoffernes overgang til særanliggende, som indebærer overtagelse af den lovgivende og administrative myndighed på området.

Afslutningsvis bemærkes, at stilleren af forespørgslen i bemærkningerne til denne anfører, at regeringen efter et udvalgsarbejde i sidste halvdel af 1980'erne anerkendte, at området kunne overtages som særanliggende. Som det fremgår af en pressemeddelelse af 29. august 1988 fra Statsministeriet og Færøernes landsstyre var emnet for de da aftalte efterfølgende forhandlinger »i hvilket omfang og på hvilke vilkår det - med respekt af Statens højhedsret og under hensyntagen til rigsfællesskabets interesser - vil være muligt, at hjemmestyret overtager forvaltningen af råstofområdet som særanliggende.«

100-8 Fyrispurningur til John Petersen, landsstýrismann viðv. FAS-líkari skipan fyri fiskiskip

Ár 1997, týsdagin 28. oktober, boðaði formaðurin frá omanfyri nevndu fyrispurningi frá Óla Breckmann, løgtingsmanni, sum var sotjóðandi

Kann landsstýrismaðurin greiða tinginum frá, hvønn týdning tað hevði fingið fyri rakstrarúrslitið hjá fiskiflotanum, um ein FAS-lík skipan fekst at virka fyri fiskiskap nakað sum tann, galdandi fyri farmaskip?

Viðmerkingar

Tað verður tikið sum givið í flestu framkomnu londum, at farmaskip hava skattligar sersømdir tilfeingi betur at klára kappingina móti londum við lægri kostnaðarstøði. Umframt FAS kunnu verða nevnd Dansk ella Norsk International Skibsregister, DIS og NIS.

Hesar skipanir eru ymiskar, men felags fyri tær er, at útgerðarfeløg sleppa undan at gjalda sjómonnum tann partin av hýrunni, sum svarar til skattin av hýruinntøku. Fyri sjómenninar broytir tað ikki útgoldnu nettolønina, men fyri skip og harvið arbeiðspláss hjá sjómonnum er tað spurningur um avlop ella ball.

Hóast føroysku hýruprosentini á fiskiskipum eru lægri enn tey íslendsku, norsku, donsku o.o. her á leið, munnu inntøkurnar hjá fiskimonnum okkara yvirhøvur vera lægri enn í grannalondunum. Ikki hert hava Føroyar lutfalsliga fleiri fiskimenn við smærri fiskastovnum, men eisini hevur bruttohýran hilnast illa av høgum skattatrýsti. Nú fer landsstýrið at leggja fram uppskot til at linka fiskimannaskattin, so útgoldna hýran økist, og føroyskir fiskimenn sleppa undan at flyta til Noregs, ella teir flutu venda heimaftur.

At reka skip í Føroyum loysir seg illa, og við verandi hýruprosentum man úrslitið hjá skipunum helst fara at versna. Flotin er ov gamal og eldist, um fløgustuðulin dettur burtur í 1998, tí yngru og dýraru skipini verða seld út av landinum. Tí eru útlitini døpur fyri endurnýggjan fiskiskipaflotans undir verandi umstøðum.

Sum dømi hevði fiskiskip við 5 mió. kr. í árligum veiðivirði havt umk. 2 mió. kr. í hýrnútreiðslum, sum eftir skatt gevur umk. 1,3 mió. kr. ált til manningina, umk. 200.000 kr. í part fyri árið, um 5-6 menn eru við. Við komandi skattalætta nakað meiri.

Men slapp skipið undan at gjalda tær 5-700.000 kr., sum í hesum dømi verða tiknar í skatti, hevði tað gjørt, at skipið ikki bert hevði sloppið undan halli, men hevði kanska klárað eitt avlop til nýfíggur og endurnýggjan. Útgoldna hýran til manning varð óbroytt.

Ált eru umk. 600 mió. kr. útgoldnar í hýrum til fiskimenn í fjør, sama f.ár. Av hesum bera skipini umk. 500 mió. kr., og skatturin av hesum umk. 500 mió. kr. man liggja um 200 mió. kr. Eftir skattalættan umk. helvt-

hundrað mió. kr. minni. Um flotin slapp undan at gjalda hesar 150-200 mió. kr. hevði fiskiflotin rakstrarliga helst borið seg so frægt, at aftur kundi hugsast um at endurnýggja og rationalisera flotan.

Við hesum minnu hýruútreiðslum hevði skipunum tørvað tilsvarandi minni í stuðuli, og landskassin hevði spart tað í útreiðslum, sum hann fær minni inn í skatti av hýrum.

Landsstýrismaðurin verður biðin um at lýsa nærri fyri tinginum við neyvari tølum út frá stakdømum fyri skip og skipabólkar, hvat tað hevði havt at týða fyri raksturin og útlitini hjá bøvuðsvinnuni á sjónum, um landsstýrið fyrireikaði, og tingið samtykti lógir um eina FAS lika skipan fyri fiskiskip. Eisini hvussu lutfallið er millum tað, sum landskassin fekk minni í skattainntøku, og sum landskassin spardi í tægri stuðuli til fiskivinnuna.

29. oktober 1997 varð við 21 0 0 atkvøðum samtykt, at fyrisparningurin skuldi svarast.

10. desember 1997 svaraði, John Petersen, landsstýrismaður, fyrisparningjunum soleiðis:

Um ein FAS-lík skipan verður sett í gildi fyri fiskiskip, har afturberingin er 28% av hýrukostnaðinum til reiðaríið, so lækkar útgjaldingin hjá reiðarínum samsvarandi, og rakstrarúrslitið fyri eitt miðalrikið skip í einum ávísum skipabólki verður munandi betri.

Í teimum roknidømum, sum uppsett niðanfyri, verður roknað við miðalúrslitum fyri 3 skip í bólkunum línuskip, partrolarar og lemmatrolarar. Roknskaparárið er 1995, og dømini eru tikin frá tí arbeiði, sum landsstýrismaðurin í fiskivinnumáltum setti í verk við at lata serkønar talviðgera støðuna í fiskiflotanum, sum fyrr varð gjørt í fiskivinnuráðnum.

Grundað á tøl frá Toll- og Skattstovu Føroya og útrokningar hjá Búskapardeildini, er skattaprosentið hjá føroyskum fiskimonnum í miðal uml. 45%. Inntøkan, borin av skipunum í 1996, var umt. 500 mió. kr. Av hesum er skatturin 225 mió. kr. Ein FAS-lík skipan vildi sostatt givið reiðaríum í afturbering 140 mió. kr. Hesar 140 mió. kr. koma í hesi skipan at vera afturrindaðar øllum føroyskum fiskiskipum á øllum leiðum.

Í roknidømunum eru 3 línuskip, 3 partrolarar og 3 lemmatrolarar, har verandi íløgustuðulin er tikin burtur, og ístaðin er roknað ein afturbering uppá 28% til reiðaríini.

Aðrar útgjaldingar til fiskivinnuna, sum eru á fíggjarlógini, sum koma undir lógina um minstuløn og dagstudning, flutningsstuðul ella sjúkratrygd og frítíðarløn, er ikki tikin út.

Línuskip	
1	Línuskip
2	Línuskip
3	Partrol
1	Partrol
2	Partrol
3	Lemmatr.
1	Lemmatr
2	Lemmatr
3	

Søla:	5.533	5.668	5.430	7.911	6.259	4.660	9.744	7.451	8.447
Rakstrarútg.:	-2.398	-3.155	-2.908	-2.756	-3.511	-2.144	-5.109	-4.112	-3.690
Hýra:	-2.585	-2.365	-2.440	-3.297	-2.439	-2.325	-3.504	-2.759	-3.302
Úrslit:	550	148	83	1.858	310	191	1.131	580	1.454

Fyrisiting:	0	0	-110	0	24	0	-178	-112	0
Avskrivingar:	-482	-438	-348	-915	-559	-177	-1.152	-291	-835
Rentuinntøka:	22	19	0	2	6	1	7	19	3
Rentuútreiðsla:	-384	-362	-281	-1.316	-697	-102	-1.332	-250	-897
Úrslit2:	-294	-633	-656	371	917	88	1.523	-54	-275
Afturber 28%	**724**	**662**	**683**	**923**	**683**	**651**	**981**	**773**	**925**
Úrslit3: aftur	**430**	**29**	**28**	**552**	**-234**	**563**	**-542**	**718**	**649**

Samanborið við núverandi íløgustuðul, verður endaliga úrslitið væl betur fyri línuskipini, tí tey fingu ein lægri íløgustuðul enn trolararnir, sum nú í fleiri førum fáa eitt verri úrslit, tá afturberingin er minni enn verandi íløgustuðul. Hesin ójavni stavar frá tí, at í eini FAS-líkari skipan fer afturberingin til øll fiskifør í flotanum, meðan galdandi íløgustuðul er avmarkaður til fesktiskaveiðu undir Føroyum Tað er tí torført at meta um, í hvønn mun ein FAS-líka skipan fer at elva til endurnýggjan av skipaflotanum, men hon merkir ein týðandi niðurskurð í hýrukostnaðinum.

Tað, sum er avgerandi fyri endurnýggjan av skipaflotanum, er tann rentuberandi skuldin í skipinum. Í álitinum frá endurskoðanarnevndini, sum hevur verið til viðgerar í løgtinginum, er hesin spurningur viðgjørdur nágreinliga. Tað er ymist, hvussu teir ymisku skipabólkarnir klára seg, men tað verður staðfest, at føroysku hýrupartarnir eru hægri enn í okkara grannalondum.

Í viðmerkingunum til spurningin verður samanborið við tær sersøndir, sum farmaskip hava í Føroyum og í fleiri av okkara grannalondum. Í hesum føri má eisini vera hugt eftir, um slíkar skipanir eru kappingaravlagandi, ella um tatan er um íløgustuðul fyri avmarkaða tíð.

Tað eru onnur viðurskifti, sum gera mun á eini FAS-skipan, har reiðaríið má gjalda eina bruttohýru, og har skatturin er ymiskur, alt eftir um manningin er føroysk ella útlendsk Ein útlendingur á einum føroyskum skipi undir FAS-skipanini, skal gjalda 35% í skatti, og verður reiðarínum afturborið 28% av hýruinntøkuni, meðan tey 7% fara í landskassan. Í eini DIS-skipan skal reiðaríið gjalda eina nettohýru, meðan ein endurlíkning verður gjørd fyri frádráttir sjómansins í hesi skipan.

100-9 Fyrispurningur til Sámal Petur í Grund, landsstýrismann viðv. farmaflutningi hjá Strandfaraskipum Landsins og bussunum hjá Bygdaleiðum

Ár 1997, fríggjadagin 21. november, bodaði formaðurin frá omanfyri nevnda fyrispurningi frá Lassa Klein, løgtingsmanni, sum var soljóðandi

1) Hvussu nógv flutningstól, trailarar og lastbilar hevur Strandfaraskip Landsins um hendi: eigur, leasar og umsitur fyri aðrar?

2) Hvussu nógv av sonnu flutningstólum komu undir umsiting stovnsins í 1994, 1995, 1996 og pr. 19. november 1997, og hvussu nógv flutningstól hevur stovnurin ætlanir um at keypa ella yvirtaka í framtíðini?
3) Hvussu nógv er nøgdin á farmi økt við sonnu flutningstólum árini 1994, 1995, 1996 og pr. 19. november 1997?

4. Hvussu nógv hava somu flutningstólini (lastbilar/trailarar) goldið til Strandfaraskip Landsins í farmagjaldi fyri flutning árini 1994, 1995, 1996 og pr. 19. november 1997?

5. Hvussu stór hevur inntøkan fyri hvert einstakt ferðaskip hjá Strandfaraskipum Landsins verið í 1994, 1995, 1996 og pr. 19. november 1997 av flutningi av flutningstólum (lastbilum/trailarum), sum Strandfaraskip Landsins eigur, leasar ella umsitur?

6. Hvussu nógvar bussar hevur Strandfaraskip Landsins/Bygdaleiðir og ella tað almenna yvirtikið frá privatum í 1994, 1995, 1996 og pr. 19. november 1997, og eru ætlanir um at yvirtaka fleiri í framtíðini?

Viðmerkingar
Í samgonguskjalinum stendur: »So nógvar ferðaleiðir og lutcindir í ferðsluskipanini sum gjørligt, hartnalir farmaflutningar innanoyggja, skulu bjóðast út til privatar at nøkja samboert sáttmála í ávíst tíðarskeið, har tað kann gerast við fyrimuni«.

Talan er í hesum sambandi um verandi eindir, tá samgongan tók við, men síðani tá hevur Strandfaraskip Landsins víðkað munandi um sítt virksemi og tænastustøði, og hetta hevur ført til, at stovnurin nær tað skal vera, yvirtekur allan flutning bæði á landi og sjógvi.

Eingi tíðindi hava gingið um, at nakrar lutcindir í ferðsluskipanini eru bodnar út, og er tí stórur ampi av virkseminum hjá Strandfaraskipum Landsins, sum hevur ført við sær kappingaravlagandi umstøður, við tí fyrsliti, at enn fleiri privatir arbeiðstakarar eru givnir, ella fara at gevast, um ikki broyting kemur í á hesum øki.

Tvørturímóti ganga tíðindi um, at Strandfaraskip Landsins hevur økt munandi um sítt virksemi, ikki bara á hesum øki, men eisini tá talan er um bussar hjá Bygdaleiðum.

Sáttmálaviðurskiftini á mongum økjum hjá Bygdaleiðum eru í dag so vánalig, at fleiri busseigarar av hesi orsøk hava valt at givið skarvin yvir, ella umhugsað spurnigin.

Røddir eru frammi um, at sama ger seg galdandi í sambandi við flutning av farmi við lastbilum og trailarum.

Soleiðis sum gongdin tykist verða í lotuni, er tað bert ein spurningur, nær allur flutningur á sjógvi og landi verður miðsavnaður á einum almennum stað, hetta høast lyftini í samgonguskjalinum hjá sitandi samgongu.

Miðvísu almennu yvirtøkurnar órógva privata arbeiðsmarknaðin, sum ikki hevur sama møguleika at kappast sum t.d. Strandfaraskip Landsins, hvørki tá talan er um almennar skattakrónur, ella tá talan er um fyrimunir, sum almennu flutningstóliri kunnu fáa við egnum skipum.

Tá so almennu flutningstólini eisini fáa almennan flutningsstuðul til flutning av fiski, eru privatu flutningstólini so illa fyri í kappingini, at neyvan er gjørligt at halda fram leingi aftrat.

Ætlanir hjá tí almenna tykjast í dag so miðvísar, at illa slepst undan eini uppgerð soleiðis, at privati arbeiðsmarknaðurin fær fult innlit í, hvørjar ætlanir eru á hesum øki, og fyrsta stigið á leiðini er, at landsstýrismaðurin svarar omanfyristandandi spurningum.

25. november 1997 varð við 22-0-0 atkvøðum samtykt, at fyrispurningurin skuldi svarast.
Fríggjadagin 13. mars 1998 svaraði Edmund Joensen, løgmaður (fyri Símun V. í Grund), fyrispurninginum soleiðis:

Til spurning 1.
Tann 19. desember 1997 átti Strandferðslan:

- 22 akfør, tarav 17 lastbilar og 5 minni vøruvognar.
- 39 trailaralastir.

Strandfaraskip Landsins leasar ikki og umsitur ikki flutningstól, so sum trailarar ella lastbilar, fyri onnur.

Til spurning 2.
Talið á lastbilum/vøruvognum og trailaralastum hjá Strandferðsluni hevur hesi 4 árini verið hetta:

Ár	Akfør	Trailaralastir
1994	23	34
1995	22	51
1996	23	49
1997	22	39

Talan er sostatt um ávísa lækking av akførum í 1997, tvs. eitt akfar. Harafturímóti bliva trailaralastirnar 10 fleiri sama árið. Ætlanin er at lækka talið á flutningsútbúnaði uppaftur meira í 1998.

Tá ætlanir verða gjørdar um keyp ella yvirtøku av útbúnaði hjá Strandferðsluni, so er tað fyrst og fremst treytað av teimum uppgávum, sum fyritøkan skal loysa innan farmaflutningin í framtíðini. Annars er keyp treytað av m.a. tekniskari og rakstrarhúskaparligari livitíð fyri flutningstólini, og hvat ið er fíggjarliga skilagott fyri at økja tænasmið hjá fyritøkuni.

Tað at Strandfaraskip Landsins er eio landsfyritøka merkir, at hon í mest møguligan mun skal verða rikin á handilsligum støði, og at hon á fíggjarlógini einans er stýrd við eini nettoútreiðslujáttan2.

Til spurning 3.
Við verandi frankeringarskipan er ikki gjørligt at fáa upplýsingar um nøgdir, slag av flutningi og t.d. geografiskt býti, men arbeitt verður við at gera eina hagtalsskipan til stýringarendamál.

Roknað verður við, at inntøkurnar av farmakoyringini eru oktar 3,4 mió. kr. seinastu 4 árini (grundað á framrokning fyri 1997).

Farmalnntøkurnar seinastu 4 árini vóru (í mió. kr.):

1994	1995	1996	pr. 30.11.97
8,18	9,31	10,38	10,77 mió. kr.

Til spurning 4 og 5.
Inntøkan hjá ferjunum av at flyta farmaflutningstól hjá Strandferðsluni á teim ymsu leiðunum hevur verið hendan (1.000 kr.):

Leið	1994	1995	1996	1997 pr. 31.10
Suðuroyarleiðin	2.700	3.600	2.000	1.519
Vestmannasund	125	42	191	207
Leirvíksfjarðarleiðin	561	369	374	583
Sandoyar- og Hestleiðin	104	49	72	215
Tilsamans	3.490	4.060	2.637	2.524

Til spurning 6.
Nevnast kann, at allur raksturin av Bygdaleiðum í løtuni gevur eitt árligt hall uppá 6 mió. kr., herundir er eitt hall uppá umt. 8 mió. kr. fyri privatu útbjóðingina.
Málsetningurin er at fáa meira løsemi í raksturin av Bygdaleiðum við betri kapasitets-, inntoktu- og útreiðslustýring og støðugt at økja tænastustøðið.

Sambært reglugerðini er álagt Strandferðsluni, at hon í so stóran mun sum gjørligt skal rekast á handilsligum støði.

Politikkurin hjá Strandfaraskipum Landsins hevur higartil verið, at tá ein bussur verður yvirtikin frá privatum, so hevur tað m.a. verið kannað av, hvat ið hevur verið skilagott marknaðarliga, um tað økir nýtsluprosentini og betrar lønsemið.

Í 1994 var 1 bussur yvirtikin, í 1995 ongin, í 1996 6 bussar og í 1997 varð ein 1 bussur yvirtikin frá privatum.

Ongar ætlanir eru um at yvirtaka fleiri bussar frá privatum. Politikkurin at endurnýggja bussarnar er, at **í minsta lagi ein** gamal bussur fer úr skipanini, seldur ella vrakaður, fyri hvønn nýggjan, ið verður keyptur.

Landsstýrissamgongan hevur í samgonguskjalinum avtalað, at almenni tænastusektorurin, herundir eisini samferðsluøkið, *»verður endurskoðað við tí endamáli at laga útreiðslurnar eftir teimum inntøkum, sum føroyska samfelagið hevur, tá so at vit hava góða og forsvarliga tænastu. Høkiligar sparingar innan tað almenna kunnu vera: Effektiviseringar, privatiseringar, útlisteringar, samanlegging av stovnsfunktiónum.«* Eisini er í samgonguskjalinum avtalað, at: *»So nógvar ferðaleiðir og lutvinaltir í ferðslukipanini sum gjørligt, herundir farmaflutningar innanoyggja, skulu bjóðast út til privatar at røkja sambært sáttmála í ávísa tíðarskeið, har tað kann gerast við fyrimuni.«*

Við betri fíggjarstýring verður fyritøkan nú rikin við einum nonni árligum rakstrarískoyti úr landskassanum. Raksturin seinastu árini hevur kostað landskassanum millum 50 og 60 milliónir kr. um árið, og okkurt árið meira enn 70 mió. kr. Rakstrarískoytið fyri 1998 er komið niður á 43,8 mió. kr. Játtanin fyri 1998 fer væntandi at halda, um ikki óvæntað óhapp henda.

Privatiseringar/útlisiteringar

Samgongan er nú farin í holt við at fremja sín arbeiðssetning til tess at kanna, hvørjir partar av virkseminum hjá Strandfaraskipum Landsins skulu privatiserast ella útlisterast, og á hvønn hátt hetta skal verða gjørt. Fyrsti fundurin hevur verið millum Vinnumálastýrið og Strandferðsluna, har serligur dentur varð lagdur á privatisering innan farmaleiðirnar á landi og bussarnar, eins og innan onnur virkisøki.

Fyri at varðveita eitt rímiligt tænastustøði fyri borgarar og vinnulív er neyðugt, at privatisering og/ella útlisitering fer fram á ein skipaðan hátt og soleiðis, at sum mest fæst fyri ogntr, sum verða seldar. Ein tílík fyritreikingar- og útbjóðingartilgongd hevur hesar ættir:

1. Politiskar og umsitingarligar fyritreikingar.
2. Politisk avgerð.
3. Kanning av starvsfólki, ráðføring við tey og lýsa hvør uppgávur, ið skulu gerast.
4. Áseta tænastustøðið og gera greitt, hvussu dygdin á tænastuni kann verða mátað.
5. Gera greitt, hvussu (um nakar) eftirlitsbygnaðurin skal verða.
6. Gera útbjóðingartilfar.
7. Gjøgnumføra útbjóðingina.
8. Velja arbeiðstakarar og gera sáttmála.
9. Yvirføra uppgávur, og møguliga materiell og starvsfólk.
10. Fylgja upp við góðskueftirliti og møguligum øðrum sáttmálaviðurskiftum.

Arbeitt verður nú við at fremja hesar ætlanir.

At enda kann tað vera hóskandi at gera onkra retting til viðmerkingarnar í fyrispurninginum. Í 2. reglubrotti vil spyrjarin vera við, at Strandfaraskip Landsins hevur viðkað munandi um sítt virksemi, men veruleikin er

tað øvugta, sum áður nevnt. Harafturat kann nevnast, at sambandið til Skotlands frammyir verður á fleiri hondum. Skipafelagið Føroyar hevur farmaflutning til Skotlands alt árið, Norrona fer at sigla til Hetlands í summar, og harafturat fer Atlantic Airways undir reglutigt samband við Skotland í summar.

Í 8. reglubroti vil spyrjarin vera við, at almennu flutningstólini hjá Strandferðsluni hava kappingarfyrimun við egnum skipum, men hetta er ikki so, tí bilar og trailarar hjá Strandferðsluni hava ikki framíhjáræm á ferjunum.

Til 9. reglubrot í viðmerkingunum í fyrispurningunum er svarið, at tað eru ikki tey almennu flutningstólini, ið fáa flutningsstuðul. Flutningsstuðulin verður veittur fiskakeyparum, uttan mun til um fiskurin verður fluttur á almennum ella privatum fjólum.

1 Tann 19. desember 1997 er svarið komið frá Strandfaraskipum Landsins til yvirsu spurningarnar í fyrispurninginum.
2 Um landsfyritøkur, sí eisini síðurnar 375, 378 og 382-383 í prentaðu, dagførdu Fíggjarløgtingslógini 1998.

100-10 Fyrispurningur til Edmund Joensen, løgmann, viðv. setan av fólki í landsumsitingini

Ár 1997, miðvikudagin 3. desember, boðaði formaðurin frá omanfyri nevnda fyrispurningi frá Henrik Old, løgtingsmanni, sum var soljóðandi:

1. Hvussu nógvir aðalstjórar, deildarstjórar v.m., ráðgevarar, fulltrúar og onnur starvsfólk eru sett í landsumsitingini frá 1. august 1996 og fratn til dagin í dag.

2. Hvussu nógv tænastumannastørv eru niðurløgd, og hvussu nógv størv eru umskipað í omanfyri nevnda tíðarskeiði í landsumsitingini.

Viðmerkingar
1. august 1996 varð nýggjur løgmansstjóri settur, og er ein av høvðusuppgávum stjórans at seta bygnaðaruppskotið hjá Finn Norman Christensen í verk.

Síðan hava vit dagliga í fjølmiðlunum sæð og hoyrt um starvssetanir innan umsitingina og um uppsagnir vm. av fólkum, sum ikki nógv er fyri í hesum nýggja bygnað.

Undirritaði vil við hesum spurningi fegin fáa greiði á talinum á nýggju størvunum og á teimum, sum eru niðurløgd ella umskipað.

4. desember 1997 varð við 18 0-0 atkvøðum samtykt, at fyrispurningurin skuldi svarast.

20. januar 1998 svarað, Edmund Joensen, løgmaður, fyrispurninginum soleiðis:

Til spuruing 1.
Á talvuni niðanfyri sæst talið á størvum, sum eru sett í tíðarskeiðnum frá 01.08.1996 til 03.12.1997 í landsfyrisitingini, sum fevnir um Løgmansskrivstovuna, Vinnumálastýrið, Fíggjarmálastýrið, Fiskimálastýrið, Undirvísingar- og mentamálastýrið og Almanna- og heilsumálastýrið (sí viðmerkingarnar til svarið).

	Nýggj størv[1]	Verandi størv[1]	Umskipað størv[1]	Niðurløgd størv[1]
Løgmansstjóri	-	-	1	-

Aðalstjórar	4		-	-
Deildarstjórar	-	-	1	2
Deildarleiðarar	-	-	-	1
Ráðgevarar	-	-	-	-
Fulltrúar	7	4	1	-
Onnur starvsfólk	2	2	-	-
Tilsamans	13	6	3	3

[1]Nýggj støvr eru støvr, sum ikki hava verið sett fyrr.
[2]Verandi støvr eru støvr, har fólk eru farin úr starvi og annað fólk er sett ístaðin.
[3]Umskipað støvr eru verandi støvr, sum eru sett av nýggjum og broytt munandi í innihaldi.
[4] Niðurlagd støvr eru støvr, sum ikki longur eru í miðfyrisitingini.

Viðmerkingar til spurning 1:
Oljumál (fyrrverandi Oljufyrisitting - í framtíðini oljumáladeild í Vinnumálastýrinum)

Nýggj støvr:	3 fulltrúar og 1 annað starv (skrivstovufólk)
Verandi starv:	1 deildarstjórastarv (lutvíst umskipað starv)

Aðrar viðmerkingar til spurning 1:
1) Avgerðir eru tiknar um aðrar setanir, har starvsfólkini ikki byrja fyrr enn í 1998, og tí ikki eru tikin við í yvirlitið. Hesi eru:

Nýggj støvr:	1 aðalstjóri og 1 fulltrúi
Verandi starv:	1 fulltrúi
Umskipað støvr:	2 deildarstjórar og 1 skrivstovuleiðari

2) Fíggjarmálastýrið, Almanna- og heilsumálastýrið og Fiskimálastýrið eru enn ikki endaliga skipað, og útgangsstøðið í svarinum er tí fyrrverandi deildir í Tinganesi.

Til spurning 2.
Trý tænastumannastørv eru niðurlagd, og 3 støvr eru umskipað í tíðarskeiðnum 01.08.1996 til 03.12.1997. Sí annars talvuna omanfyri.
+ skjal.

Skjal.

Útgreinað svar

Spurningur 1. Hvussu nógvir aðalstjórar, deildarstjórar v.m., ráðgevarar, fulltrúar og onnur starvsfólk eru sett í landsumsitingini frá 1. august 1996 og fram til dagin í dag (03. desember 1997)

Svar:
Aðalstjórar
Síðan 1. august 1996, eru fýra aðalstjórar settir. Teir eru Vinnumálastjóri, Arne Poulsen 1. februar 1997, Almanna- og heilsumálastjóri, Høgni Joensen, 1. mai 1997, Undirvísingar- og mentamálastjóri, Petur Petersen, 1. juni 1997 og Fíggjarmálastjóri, Petur Alberg Lambaugo, 1. oktober 1997. Løgmansstjórin varð settur í starv 1. august 1996. Hann varð settur í starvið sum Finn Norman Christensen frammanundan hevði, og talan var tískil ikki um eitt nýtt starv, men um eitt umskipað starv. Fiskimálastjórin varð settur 19. desember 1997, og byrjar í starvinum fyrst í 1998. Fiskimálastjórastarvið er tískil ikki talt við í talvuni á síðu 3, tí tað fellur uttanfyri tíðarskeiðið, spurt verður um.

[1] Sí stykkið um fulltrúar

Deildarstjórar
Sum yvirlitið vísir, er talan um trý deildarstjórastørv. Eitt deildarstjórastarv er umskipað, av tí at lønar- og starvsfólkadeildin á Landsskrivstovuni er vorðin broytt soleiðis, at lønarmál verða fyrisitin í Fíggjarmálastýrinum og starvsfólkamál á Løgmansskrivstovuni. Deildarstjórastarvið, sum frammanundan var á Landsskrivstovuni, varð flutt til lønardeildina í Fíggjarmálastýrinum. Eitt deildarstjórastarv í Undirvísingar- og mentamálastýrinum, er niðurlagt. Eitt deildarstjórastarv á fyrrverandi Almanna- og heilsudeildini er niðurlagt.

Aðrar viðmerkingar:
Í Fíggjarmálastýrinum er deildarstjórastarv umskipað til fulltrúastarv.[1]

Viðmerkjast skal eisini, at Løgmansskrivstovan hevur lýst eftir tveimum deildarstjórum, øðrum til starvsfólkadeildina og hinum til løgdeildina. Tó eru hesi størv ikki sett.

Deildarleiðarar
Eitt starv í Undirvísingar- og mentamálastýrinum (Landsskúlafyrisitingini) er niðurlagt, tvs. tann, sum nýtti starvið, er farin frá við eftirløn.

Ráðgevar
Ongin ráðgevi er settur

Fulltrúar
Á Løgmansskrivstovuni er eitt nýtt fulltrúastarv. Tað er starvið sum nýskipanarfulltrúi.

Almanna- og heilsumálastýrið hevur sett ein fulltrúa í nýtt starv og haraftrat ein í starv, tí annar fulltrúi var farin úr starvi.

Fíggjarmálastýrið hevur sett tveir nýggjar fulltrúar í sambandi við, at lønardeild varð stovnssett í Fíggjarmálastýrinum. Harumframt er talan um deildarstjórastarv, sum er umskipað til fulltrúastarv, og um setan av tveimum fulltrúum, sum komu í starv, tí aðrir vóru farnir úr starvi.

Í Vinnumálastýrinum eru tvey nýggj fulltrúastørv. Í Undirvísingar- og mentamálastýrinum er ein fulltrúi settur í nýtt starv.

Onnur starvsfólk
Almanna- og heilsumálastýrið hevur sett ein skrivara í nýtt starv, og ein skrivara í starv, tí annar skrivari var farin úr starvi.

Vinnumálastýrið hevur sett ein skrivara í nýtt starv, og ein skrivara í starv, tí annar skrivari var farin úr starvi.
Undirvísingar- og mentamálastýrið hevur sett skrivara í starv, tí annar skrivari var farin úr starvi.

Ískoyti til spurning 1
Til spurning eitt, eru hesar viðmerkingar:
a) Oljumál (fyrrverandi Oljufyrisiting - í framtíðini oljumáladeild í Vinnumálastýrinum). Hesi størv eru sett.
Verandi størv: Deildarstjórastarvið á oljumáladeildini (sum lutvíst er umskipað starv).
Nýggj størv: Trý fulltrúastørv og eitt skrivstovustarv.

b) Avgerð er tikin um ávísar setanir, har starvsfólkini tó ikki byrja fyrr enn 1998. Býtt verður upp í nýggj størv, verandi og umskipað størv.
Nýggj størv: Aðalstjóri í Fiskimálastýrinum og sendifulltrúi í Brüssel.
Verandi starv: Fíggjarfulltrúi í Undirvísingar- og mentamálastýrinum.

[1] Sí stykkið um fulltrúar

Umskipað støtv: Tveir deildarstjórar í Undirvísingar- og mentamálastýrinum, skrivstovudeildari til komandi Kærufyrisiting.

Spurningur 2: Hvussu nógv tænastumannastørv eru niðurløgd, og hvussu nógv størv eru umskipað í omanfyrinevnda tíðarskeiði í landsumsittingini. (tvs. frá 01. aug. 1996 til 03. desember 1997)

Svar:
Eitt tænastumannastarv, deildarleiðari, er niðurlagt í Undirvísingar- og mentamálastýrinum og eitt tænastumannastarv, deildarstjóri, er niðurlagt eisini í Undirvísingar- og mentamálastýrinum. Eitt tænastumannastarv, deildarstjóri, er niðurlagt á Almanna- og heilsumálastýrinum.

Trý størv eru umskipað. Tey eru: Løgmansstjóraembætið, deildarstjóraembætið á lønardeildini í Fíggjarmálastýrinum, og eitt starv er umskipað frá deildarstjórastarvi á Fíggjar- og búskapardeildini í Fíggjarmálastýrinum, til fulltrúastarv.'

Víst verður annars til niðanfyristandandi talvu.

Samanteljing

	Sett		Umskipað*	Niðurlagt*	Frágreiðing
	Nýtt starv	Verandi			
Løgmansstjóri/					
Aðalstjórar	4		1		
Deildarstjóri v.m.			1	2	
Deildarleiðarar				1	
Ráðgevar					
Fulltrúar	7	4	1		
Onnur starvsfólk	2	2			
Alt	13	6	3	3	
Nýtt starv, er starv, sum ikki hevur verið sett áður					

Verandi starv, er starv, sum hevur verið sett áður, tvs. starvsfólk er farið úr starvi og annað starvsfólk er sett.

Løgmansskrivstovan

	Sett		Umskipað*	Niðurlagt*	Frágreiðing
	Nýtt starv	Verandi			
Forstjóri			1		Starvið sum Finn Normann Christensen hevði
Deildarstjóri v.m. sjóra					Lýst hevur verið eftir deildarstjóra til starvsfólkadeildina og deildin, nú eru hesi starv ikki sett
Deildarleiðarar					
Ráðgevar					
Fulltrúar	1				Nýskipanarfulltrúin
Onnur starvsfólk					
Alt	1				
	Almanna- og heilsumálastýrið				

	Sett: Nýtt starf	Sett: Verandi	Umskipað*	Niðurlagt*	Frágreiðing
Aðalstjóri	1				
Deildarstjóri v.m.				1	Niðurlagt starf á fyrrverandi
Deildarleiðarar					Almanna- og heilsudeild
Ráðgevar					
Fulltrúar	1	1			
Onnur starvsfólk	1	1			
Í alt	3	2		1	
		Fíggjarmálastýrið			

	Sett: Nýtt starv	Sett: Verandi	Umskipað*	Niðurlagt*	Frágreiðing
Aðalstjóri	1				
Deildarstjóri v.m.			1		Lønar- og starvsfólkadeildin
					verður býtt í tveir partar og
					starvið hjá deildarstjóranum verð
					ur at rokna sum starvið hjá deild
					arleiðara á lønar- og starvs fólka
					deildini á Landskrivstovuni
Deildarleiðari					
Ráðgevar					
Fulltrúar	2	2	1		Tveir nýggir fulltrúar í sambond
					við uppretting av lønardeild
					Tveir fulltrúar í verandi starv.
					Ein fulltrúi umskipað frá deild-
					arstjóra starvi.
Onnur starvsfólk					
Í alt	3	2	2		
		Vinnumálastýrið			

	Sett: Nýtt starv	Sett: Verandi	Umskipað*	Niðurlagt*	Frágreiðing
Aðalstjóri	1				
Deildarstjóri v.m.					
Deildarleiðari					
Ráðgevar					
Fulltrúar	2	1			
Onnur starvsfólk	1	1			
Í alt	4	2			Starvsfólk á oljumiðadeildini
					eru ikki tald við. Sí frágreiðing
					undir «Oljuøkir» á síðu 2.
		Undirvísingar- og mentanámálastýrið			

	Sett Nýtt starv	Verandi	Umskipað*	Niðurlagt*	Frágreiðing
Aðalstjóri	1				
Deildarstjóri v.m.				1	
Deildarleiðari				1	á Landskrákfyrisitingini tíðin tíl við eftirlon
Ráðgevar					
Fulltrúar	1				
Onnur starvsfólk		1			
Í alt	2	1		2	
		Fiskimálastýrið			

	Sett Nýtt starv	Verandi	Umskipað*	Niðurlagt*	Frágreiðing
Aðalstjóri					Aðalstjóri settur at byrja í 1998
Deildarstjóri v.m.					
Deildarleiðarar Ráðgevar					
Fulltrúar					
Onnur starvsfólk					
Í alt					

100-11 Fyrispurningur til Kristian Magnussen, landsstýrismann, viðvíkjandi gagnnýti av Sjúkrahúsverki Føroya

Ár 1997, mánadagin 15. desember boðaði formaðurin frá omanfyri nevndu fyrispurningi frá Rúna Sivertsen, løgtingsmanni, sum var soljóðandi

1. Hevur landstýrið ætlanir um at samskipa sjúkrahúsverkið soleiðis, at orka og útgerð verða nýtt til fulnar?

2. Eru setanarviðurskiftini nøkur forðing fyri, at serútbúgvin fólk innan heilsuverkið verða flutt í millum sjúkrahúsini uttan meirkostnað?

3. Hvussu ber tað til, at tey trý sjúkrahústni keypa somu tól og útgerð til serviðgerð, har eitt av slagnum hevði verið nøktandi fyri Føroyar?

4. Ger umsitingin yvirlit, sum vísa virktsførið á tí einstaka sjúkrahústinum, og verða hagtøl savnað, sum nágreiniliga sýna, hvat verður gjørt, og hvussu arbeitt verður? Verða hesi tøl samanborin innanhýsis og uttanlands t. d. við donsk sjúkrahús?
5. Kannar umsitingin, hvussu roynist hjá sjúklingum, og um sjúklingar eru nøgdir við viðgerðina, teir hava fingið?

Viðmerkingar

Við atliti til aftanvendandi figgjarligu trupulleikarnar innan heilsuverkið, foyri eg mær at seta landsstýrix-

manninum í heilsu- og almannamálum hesar spurningar:

ad) 1 Dagliga hoyra vit um trupulleikar innan sjúkrahúsverkið. Sum skilst, eru karmarnir á Suðuroyar Sjúkrahúsi hóskandi, meðan bæði Landssjúkrahúsið og Klaksvíkar Sjúkrahús hava ábøtur og umbyggingar fyri neyðini. Men ivi er millum mannna um, hvussu samlaða tilfeingið verður nýtt. Vit vita, at bíðitíð er á Landssjúkrahúsinum, m. a. tí at fleiri læknar eru til ov fáar skurðstovur! Eisini er samfikt, at avloysitíð er á skurðstovunum bæði á Tvøroyri og í Klaksvík. Í nógv ár hava Klaksvíkar Sjúkrahús og Suðuroyar Sjúkrahús hayt serviðgerð av ymiskum slag um hendi. Men orsakað av at øll trý sjúkrahúsini hava vavdast uppi í tí sama, eru hvørki orka ella útgerð verðin nýtt til fullnar. Tíðin mátti nú verið komin til at býtt funktiónir út á tey bæði smáu sjúkrahúsini. Tað átti at fort við sær, at rásarúmið gjørdist stórri bæði í landskassanum og á Landssjúkrahúsinum.

ad) 2 Eins og bólir til skurðviðgerð o. a. kunnu nýtast betur, skuldi hetta eisini borið til við starvsfólki. Tað ber til at flyta læknar og sjúklingar, og tað í sjálvum sær nýtist ikki at verða kostnaðarmikið. Tað hevði eisini fort við sær, at stórvini í føroyska sjúkrahúsverkinum hevdu verið meiri lokkandi og áhugaverd. Ein slík skipan hevði økt um avljóðingarnar og gjort tað lættari at lingið skikkaðar læknar eisini út á tey smáu sjúkrahúsini.

ad) 3 Eisini tá ið tól og útgerð umrøður, vantar samskipan innan føroyska heilsuverkið. Í meiri enn einum føri finnast kostnaðarmikil tól á fleiri deildum. Í Føroyum búgva einans slok 44.000 fólk, tí er láturligt at hava útgerð standandi nógv mikið til fleiri 100.000 fólk. Her verður sjálvandi ikki hugsað um tey grundtól, ið øll sjúkrahús skulu hava.

ad) 4 Um hugtøl og yvirlit finnast, sum sýna virkisførið á tí einstaka sjúkrahúsinum, so er hetta tað besta stýringsumboðið, fyrisitingin kann ynskja sær, fyri at vita um skipanin kann nýtast á annan og betri hátt. Vanligt er aðrastaðir at lata peningin fylgja við sjúklinginum. Slík skipan verður nú eisini roynd í Danmark. Sjúklingurin fær tá høvi til sjálvur at avgera, hvar hann vil verða viðgjordur. Úrslitið verður sjálvandi størri nøgdsemi og trivnaður hjá sjúklingum, stórri kapping í millum sjúkrahúsum og dygdarbetri viðgerð.

ad) 5 Ásannast má, at sjúklingar eru prísgivnir tí førleika og teimum hentleikum, sum heilsuverkið nú eina ferð hevur at bjóða. Aðrastaðir er vanligt, at sjúklingar eftir viðgerð verða spurdir um, hvussu royndist, og hvussu tey vóru nøgd við viðgerðina. Ein slík mannagongd hevði verið við til at økt um trivnaðin og nøgdsemið hjá sjúklinginum.

Samanumtikið er neyðugt, at fyrisitting og politikarar taka tey viðurskifti, ið í fyrispurningi mínum hevi umrørt, til viðgerðar. Hetta fyri at oll tey, ið hava við sjúkrahúsverkið at gera, fyrst og fremst sjúklingar, síðani tey, ið skulu játta pening eins og tey, ið innan sjúkrahúsverkið starvast, kunnu hava fult útlit í skipanini.

Týsdagin 16. desember 1997 varð við 20 0-0 atkvøðum samtykt, at fyrispurningurin skuldi svarast.

20. januar 1998 svaraði Kristian Magnussen, landsstýrismaður, fyrispurningunum soleiðis:

Ad. 1. Løgtingskvinnan sigur í viðmerkingunum, at bíðilisti er á Landssjúkrahúsinum, m.a. tí at fleiri læknar eru tíl ov fáar skurðstovur. Fyrst er at siga, at eingin bíðilisti er á Landssjúkrahúsinum. Tað er heldur ímóti eitt gott ár at bíða eftir ortopædiskum skurðviðgerðum á Klaksvíkar Sjúkrahúsi.
Orðaskiftið um, hvørt skurðviðgerðirnar í Føroyum skulu gerðast tíl á tey trý sjúkrahúsini, er gamalt. Her skal bert verða sagt, at tað verður ikki mett møguligt í framtíðini at hava kvalifiseraða skurðlæknamanning á trimum sjúkrahúsum. Heldur ikki verður mett, at tað ber til at vera serfunktiónirnar ortopædkirurgi, bleyt holdskirurgi ella gynækologi/obstetrik fyriuttan á Landssjúkrahúsinum.
Tíl tess at tryggja rationellan rakstur av sjúkrahúsverkinum, ásetti landsstýrið í 1990 (seinkaðist aftur í 1992) eina arbeiðsætlan fyri sjúkrahúsverkið. Í hesi verður m.a. ásett:

1. Tann samlaða diagnostiska og viðgerðarliga orkan í sjúkrahúsverkinum er ein eind, sum tekur sær av øllum føroyskum sjúklingum.
2. Sjúkrahússtjórin skal við hjálp frá fakkunnleika syrgja fyri, at tey hægru støðvini verða rokt soleiðis, at tænastan verður so góð sum gjørligt í øllum sjúkrahúsverkinum. Um neyðugt, skulu starvsfólk gera tænastu í styttri tíð við annað sjúkrahús enn har, tey upprunaliga eru sett í starv.

Henda ætlan ásannar, at vit ikki kunnu fáa eina geografiska eind av sjúkrahúsverkinum, men at vit ístaðin eiga at royna at fáa eina funktionella eind. Tað merkir, at fara vit framyvir at hava trý sjúkrahús, verður tað uppgávan hjá sjúkrahússtjóranum at skipa fyri, at aktiviteturin á teimum trimum sjúkrahúsunum verður lutfalsliga eins stórur, at skurðstovurnar verða brúktar eins nógv, og at arbeiðstrýstið á starvsfólkið verður líka. Til tess at realisera eina funktionella eind er tað neyðugt at kunna flyta sjúklingar, starvsfólk og tól, har tað er mest skilagott. Visitatiónsnevndir fyri meginøkini kirurgi og medicin eiga at tryggja skilabesta býtið.

Ad. 2. Ja, tíverri eru sáttmálaviðurskiftini soleiðis, at flestu starvsfólk eru rættiliga heft at tí deild, tey eru sett á. Fyri heilsuverkið er tað ein stórur trupulleiki, at t.d. sjúkrasystrar ikki kunnu flyta millum deildir. Yvirlæknarnir eru tó settir við sjúkrahúsverkið, so á teirra umráði er bert lítil forðing fyri at flyta.

Ad. 3. Ja, hetta er púra burturvið. Tað hevur ikki eydnast sjúkrahússtjóranum at samskipa tóluinnkeyp, sjálvt um hetta var ein partur av arbeiðsætlanini frá 1990. Her hava sjúkrahústni hildið fast við at keypa inn hvør í sínum lagi, sjálvt um tað í summum førum heilt týðiligt er talan um yvirkapasitet, t.d. á laboratoriuøkinum og á skopiøkinum. Rættast hevði verið, at alt innkeyp til sjúkrahúsverkið varð samskipað í eina innkeypsfunktión, sum umsat alla játtanina til nýkeyp av tólum. Henda funktión átti at ligið hjá sjúkrahússtjóranum ella í Almanna- og heilsumálastýrinum.

Ad. 4. Sjúkrahússtjórin setti í 1990 á stovn landssjúklingaskrá. Eftir stórt politiskt trýst eydnaðist tað Klaksvíkar Sjúkrahúsi at sleppa undan at lata upplýsingar til hesa skrá. Deildirnar á Landssjúkrahúsinum lata tó allar upplýsingar, soleiðis at tað ber til at samanbera virksemi, bæði innanhýsis, ár fyri ár og við sjúkrahús uttanlands. Einstaklingagrundað telduskráseting er ein avgerandi fortreyt fyri, at tað skal eydnast at gera so góð hagtøl sum møguligt, soleiðis at tað ber til at samanbera tey við t.d. donsk sjúkrahús. Her er hert at vóna, at sjúkrahúsini í Klaksvík og á Tvøroyri fara at nýta somu skrásetingarskipan sum hana, ið Landssjúkrahúsið brúkar. Hendan er gjørd eftir forskriftunum hjá danska heilsustýrinum.

Ad. 5. Nei, sjúkrahúsverkið ger ikki beinleiðis kanningar av nøgdseminum hjá sjúklingunum, soleiðis at skilja, at spurnarbløð v.m. verða latin sjúklingunum. Hinvegin er føroyska sjúkrahúsverkið tætt tengt at donsku sjúkrahúsunum við eftirlitsmyndugleikanum, Heilsustýrinum. Heilsustýrtð fylgir við, hvussu nógvar klagur eru um hvønn lækna v.m. Tað er ikki okkara meting, at støðið í Føroyum er lægri enn í t.d. Danmark. Hugskotið hjá løgtingskvinnuni at skipa fyri formligari eftirkanning av nøgdseminum er gott, og verður latið viðuri til leiðslurna á teimum trimum sjúkrahúsunum.

100-12 Fyrispurningur til Edmund Joensen, løgmann, viðv. útbygging av Vága Floghavn

Ár 1998, mikudagin 14. januar, boðaði formaðurin frá omanfyri nevnda fyrispurningi frá Torbi J. Nielsen, løgtingsmanni, sum var soljóðandi:

Hvørja støðu hevur landsstýrið til, at danska ferðslumálaráðið møguliga vil fremja eina útbygging av flogvøllinum í Vágum?

Hevur landsstýrið fráboðað donsku stjórnini, at tað tekur undir við eini útbyggingaraetlan av flogvøllinum í Vágum?

Um svarið er NEI, nær kann so roknast við, at landsstýrið boðar donsku stjórnini frá, at tað tekur undir við eini útbyggingaraetlan av flogvøllinum í Vágum – og at farið verður undir hetta arbeiðið sum skjótast?

Viðmerkingar
Fyri gott 10 árum síðani, nevniliga 10. december 1987, sendi samferðslunevnd løgtingsins, sum undirritaði tá var formaður I, skriv til donsku flogferðslusmyndugleikarnar viðvikjandi Vága Floghavn.

Í skrívinum vóru ikki færri enn 5 spurningar settir viðvíkjandi møguligari útbygging av flogvøllinum.

M.a. varð spurt um, í hvønn mun flogvøllurin kundi leingjast, og hvat hetta fór at kosta.

Svarið til henda spurning var, at ein leingjan av flogvøllinum við 200 metrum til 1450 metrar kom at kosta um 190 mió.kr.

Samstundis varð upplýst, at tað tekniskt var gjørligt at leingja flogvøllin til 1800 metrar.

Eisini setti samferðslunevnd løgtingsins soljóðandi spurning:

»Der ønskes angivet, hvorvidt den anvendte flytype har indflydelse på nudige hindringer og såfremt dette er tilfælde, ønskes besvaret, hvorledes især følgende tre flytyper begrænses: 1) Fokker Friendship 27, 2) British Aerospace 146-200 og 3) Boeing 737-200?«

Í svari sínum segði Statens Luftfartsvaesen m.a.:

»Det er oplyst ved bl.a. kontakt til luftfartsselskaberne, at en baneforlængelse til 1450 meter vil medføre en optimal situation for disse, særligt ved beflyvning af ruten Færoerne-København, idet der vil kunne landes med maksimal passagerantal og fragt/post i det omfang, der erfaringsmæssigt er behov for, samt brændstof til destination og alternativ lufthavn. En baneforlængelse på 1450 meter vil gøre det muligt for BAE 149-200, B 737-200/300 og F-50 at starte med maksimal fragt- eller passagerlast.«

Sum eitt úrslit av spurningunum frá samferðslunevnd løgtingsins kom ein gjølla frágreiðing frá Statens Luftfartsvaesen.

Hendu frágreiðing hevur ligið í landsstýrinum øll hesi seinastu 10 árini.

Nú er so aftur ein kanning gjørd. Hendan snýr seg um mogueikarnar fyri og kostnaðin av at seta upp eitt »glíðibanaanlegg« á flogvøllin og at leingja flogvøllin 200 metrar úr 1250 metrum upp í 1450 metrar.

Kostnaðurin av at gera alt hetta arbeiðið er nú nevndur at verða 160 mió.kr.

Tað er ferðslumálaráðið, sum í høvuðsheitum kemur at fremja flogurnar í Vágum, men eftir øllum at dømi verða ongar fløgur gjørdar í flogvøllin í Vágum, uttan so at føroyingar gera av, at verandi flogbavn actlandi verður framtíðar flogbavn okkara, og at føroyingar ongar aetlanir bava um annan flogvøll í landinum.

Tað er sera umráðandi, at greiða sum skjótast fast á hesum spurningi, soleiðis at hetta ikki forðar donsku myndugleikunum skjótast at fara undir hesa neyðugu útbygging av flogvøllinum í Vágum.
Hóast tað ikki er long tíð fráliðin, síðani landsstýrið fekk hesa seinnu kanningina handaða, so aetti føroyski politiski myndugleikin at bavt ríkiligar fortreytir fyri at bavt eina greiða stoðutakan til aetlanina í Vágum.

fyri at fáa greiði á ætlanum landsstýrisins til flogvallamálið, verður spurningurin tí nú reistur.

16. januar 1998 varð við 26-0-0 atkvøðum samtykt, at fyrispurningurin skuldi svarast.

17. februar 1998 svaraði Edmund Joensen, løgmaður, fyrispurningunum soleiðis:

Til spurning 1.
Flogsambandið er einasta ferðasambandið við umheimin stóran part av árinum. Tað hevur alstóran týdning, at flogvallarviðurskiftini eru so góð sum gjørligt. Tað er tí at fegnast um, at ferðaslumálaráðið er sinnað at herða flogviðurskiftini á flogvøllinum í Vágum.

Ferðaslumálaráðið og landsstýrið valdu eina nevnd í 1996 at kanna møguleikarnar fyri at betra um flogviðurskiftini í Vágum. Niðurstøða nevndarinnar var, at møguleiki er fyri at gera glíðibreyt á velli 31, sum er vøllurin sum gongur frá Sørvágsvatni og vesturefrir. Verður fløgan framd, kann elektroniska innflúgvingarskipanin flokkast frá ikki at vera ein presisiónsinnflúgvingarskipan til at gerast ein presisiónsinnflúgvingarskipan. Leiðbeiningin av flogførum batnar, og tað verða færri avlýsingar og seinkingar.

Glíðibreytarúnbúnaður varð royndarkoyrdur á flogvøllinum í 1997 og vístir kamingin, at glíðibreytin virkar, sum hon skal.

Nevndin kom eisini til ta niðurstøðu, at møguleiki er fyri at leingja vøllin 200 m, so hann verður 1450 m. Ætlandi verður vøllurin longdur 120 m móti vatninum og 80 m móti Sørvági. Ein slík fløga hevði gagnað flogferðsluni soleiðis, at flogfør kunnu verða lastað tyngri, røkka ferðamálum longri burturi, og fleiri slóg av flogførum kunnu lenda á flogvøllinum, sum ikki kunnu nýta vøllin í dag. Samfelagsbúskaparliga fer flogferðslan at kasta meira av sær.

Til spurning 2 og 3.
Landsstýrið hevur altíð stuðlað útbygging og betran av Vága Lufthavn yvirhøvur og verður nú roynt at fáa nýggjar fløgur gjørdar á flogvøllinum. Landsstýrismaðurin í samferðslumálum hevði fund við danska samferðslumálaráðharran 18. apríl 1997. Tá varð víst á, at flogvallarviðurskiftini í Føroyum ikki eru noktandi og ynski varð sett fram um at leingja flogvøllin í Vágum 200 m, soleiðis at hann gerst 1450 m og at seta upp glíðibreyt (glidebaneanlæg).

Løgmaður hevur í samrøðu heitt á ferðslumálaráðharran um at fremja nevndu útbygging og bjóðað honum til Føroya at greiða málið endaliga. Ferðslumálaráðharrin hevur ábyrgdina av, at flogvøllurin tekniskt og á annan hátt er á so høgum støði sum gjørligt. Við hesum fløgum betrast flogviðurskiftini, floutingskapasiteturin og reglusemið.

Samanumtikið tykjast tantr at vera sinnaðir at fáa glíðibreytina gjørda, hinvegin hava teir ikki tikið endaliga støðu til, um teir eisini vilja leingja vøllin.

Hjáløgd er frágreiðing frá Vinnumálastýrinum um flogvallarmálið.

Flogvallarmálið

1. Inngangur

Løgmaður beitti á samferðslubólkin[1] 21.01. 1998 um at lýsa flogvallarmálið yvirhovur og at geva løgmanni eitt tilmæli um, hvat skal gerast frá føroyskari síðu í næstu framtíð í spurninginum um ein framtíðar flogvøll í Føroyum.

2. Heimildir

A. Rapport om udbygning af landingshjælpemidler og banesystem på Vagar Lufthavn, skrivað av nevnd vald av landsstýrinum og ferðslumálaráðnum í september 1996, liðug 31. januar 1997.
B. Rapport vedr. forsøgsopstilling af et glidebaneanlæg, Statens Luftfartsvæsen, 10. november 1997.
C. Vagar Lufthavn, Færøerne. Baneforlængelse. Rapport skrivað av Statens Luftfartsvæsen í 1988.
D. Løgtingssamtykt 30.05. 1995, um at kanna kostnaðin av at leingja flogvøllin, osfr.
E. Finnbogi Niclasen, stjóri á Vága Floghavn, brøv til løgmann, dagfest 12. januar 1998.
F. Samrøður: Fíggjarfulltrúi í Ferðslumálaráðnum, Finnbogi Niclasen, stjóri á Vága Floghavn, Magni Arge, stjóri á Atlantic Airways.
G. Placeringsmuligheder for færøsk lufthavn, 1973, Trafikministeriet.
H. Lufthavn på Glyvursnes, A/S Anders Nyvig, Torben Skaaning, 1987.
I. Samferðslubólkurin, Reidar Nónfjall, stjóri á Strandfaraskipum Landsins, Henning Jacobsen, landsverkfrøðingur, Dávid Reinert Hansen, verkfrøðingur, Sigmundur Isfeld, fulltrúi, Atli Eiríksson, fulltrúi. Fundur í landsstýrinum um flogvallarmál, 23.01. 1997.
J. Niels Remer, skrivstovustjóri í Trafikministerinum, telefonsamrøða 03.02.1998.
K. Nýggjur flogvøllur í Føroyum - Tíðarhorisontur. Dávid Reinert Hansen, verkfrøðingur, Landsverkfrøðingurin, 03.02. 1998.
L. Frágreiðing um politiskt státus í málinum um møguligar flogvallar(út)byggingar. Sigmundur Isfeld, fulltrúi, Vinnumálastýrið, 02.02.1998.

3. Flogvøllur í Vágum

3.1. Fyrra frágreiðingin frá 1997

Ferðslumálaráðið og Landsstýrið valdu í 1996 nevnd, sum skuldi kanna møguleikarnar fyri at betra flogviðurskiftini á flogvøllinum í Vágum. Nevndin fekk sum arbeiðssetning at kanna:

Møguleikar fyri at betra lendingarhjálpartólini og at útbyggja flogvøllin

Í hesum sambandi skuldi nevndin kanna møguleikarnar fyri og útreiðslurnar í sambandi við:

1. Betran av reglusentrinum[2] á flogvøllinum við at fáa til vega glíðibreytarútbúnað[3] (glidebaneanlæg), og
2. Leingjan av flogvøllinum við 200 m, soleiðis at hann gerst 1450 m.

3.2. Tilmæli nevndarinnar, o.a

Ad. 1. Møguleiki er at gera íløgu í glíðibreyt á vølli 31[4]. Í hesum sambandi er eisini neyðugt at leingja innflúgvingarljósini til 900 m[5], fáa til vega frekvensblunkljós[6], flyta vegir, ognartaka lendi[7], og seta upp hegn. Samlaður kostnaður er 46,7 mió. kr. (Sjálvur glíðibreytarútbúnaðurin kostar bert 3,4 mió.kr.).

Henda íløga merkir, at elektroniska innflúgvingarskipanin kann flokkast frá ikki at verða ein presisiónsinnflúgvingarskipan til at gerast ein presisiónsinnflúgvingarskipan. Við hesum betrast feiðbeiningin av flogførum sum skulu lenda. Lendast kann við verri sýni enn nú, og verða tessvegna færri seinkingar og avlýsingar.

Í tíðarskeiðnum frá 1991 til 1995 hevur reglusemið verið 97,6%, t.v.s. at seinkingar ella avlýsingar uppá meira enn 24 tímar eru 2,4% av samlaðu ferðunum. Seinkingar yvirhøvur ella avlýsingar orsakað av veðurlíkindum eru tó 9,8% av samlaðu ferðunum. Ein miðal seinking uppá 10 tímar.

Við glíðibreyt verður reglusemi betrað til 98%. Seinkingar yvirhøvur (frátalt ferðir og lendingar) vegna veðurlíkindi lækka frá 8,6% til 6,8%, og verða miðal seinkingar tveir tímar stytri.

---

[1] Í samferðslubólkinum sita sum fastir limir: Henning Jacobsen, landsverkfrøðingur, Dávid Reinert Hansen, verkfrøðingur, Reidar Nónfjall, stjóri á Strandfaraskipum Landsins, og Sigmundur Isfeld, fulltrúi í Vinnumálastýrinum.
[2] Fer t.d. talan um gott reglusemi, eru fáa seinkingar og avlýsingar av flogferðum.
[3] Útgerð sum elektronisk leiðir flogførini, sum skulu lenda til flogvøllin.
[4] Vøllurin, sum gongur frá Sørvágsvatni og vestureftir.
[5] Innflúgvingarljósini eru nú uml. 470 m.
[6] Líkist blitsljósi
[7] Til tess at glíðibreytarútbúnaðurin skal virka sum hann skal, er neyðugt við slættari flatu hannara fyri útbúnaðin, soleiðis at radiobylgjurnar kunnu kastast (reflekterast) aftur. Talan er um eitt oki uppá umf. 22.000 fermetrar.

Ad. 2. Møguleiki er eisini fyri at leingja vøllin við 200 m, soleiðis at vøllurin verður 1450 m. Á Eltlandi verður vøllurin longdur 120 m móti vatninum og 80 m móti Sørvági. Samlaður kostnaður fyri at leingja vøllin, umfrámt íløgurnar nevndar eru omanfyri er 166 mió. kr.

Íløgan gagnar flogferðsluni, tí flogfør tessvegna kunnu lastast tyngri (farmur, ferðafólk, brennievni), og fleiri ymisk sløg av flogførum kunnu nýta vøllin, sum ikki kunnu nýta hann nú, tí hann er ov stuttur. Samfelagshúskaparliga fer flogferðslan av kasta meira av sær.

Statens Luftfartsvæsen vísti í 1988* á, at verður vøllurin longdur við 200 m til 1450 m, so kunnu hesi flogfør nýta hann optimalt: Fokker F-50, British Aerospace BAe 146-200, Boeing 737-200 Maerk útgáva, Boeing 737-300, serliga á rutuni Føroyar - Keypmannahavn, tí tá ber at lenda við maksimalari vekt. Samstundis verður møguligt at byrja við maksimalum ferðafólkatali, farmi og brennievni í tann mun, tørvur er á tí sambært royndum á økinum, og møguleiki verður fyri at flúgva beinleiðis úr Føroyum til Skandinavia, Norðurtýsklands, Onglands og Íslands. Vit ein nøkka ferðamálum longri burturi beinleiðis, so noyðist ein at minka farma og ferðafólkavektina og í staðin økja brennievnið.

Verður vøllurin longdur til 1800 m, verður møguligt at flúgva beinleiðis til stóran part av Miðevropa við maksimalt lastaðum flogførum.

3. 3. Seinna frágreiðingin (kanningin) frá 1997

Landsstýrismaðurin og danski ferðslumálaráðharrin umrøddu omanfyri nevndu frágreiðing á fundi 18. apríl 1997. Teir vórtu samdir um at kanna møguleikan fyri íløgu í glíðibreyt v.m. nærri. áðrenn møguliga endaliga avgerð varð tikin í málinum. Statens Luftfartsvæsen varð í hesum sambandi biðið um fáa til vega og roynd-arkoyra glíðibreytarútbúnað á flogvøllinum, fyri at siggja hvussu slík skipan reynist í roynd og veru.

Niðurstøðan av kanningini varð, at glíðibreytin virkar sum hon skal á flogvøllinum. Tíverri kann verða skilagott at nýta pening til endamálið, fyri at betra reglusemið á flogvøllinum.

3. 4. Viðmerkingar frá flogfeløgunum

Atlantic Airways, Maersk Air og Icelandair vóru spurd í sambandi við fyrru frágreiðingina. Feløgini eru samd um, at tað ikki er átrokandi tørvur á at leingja vøllin, men at tað tó er ynskiligt at hann verður longdur, fyri at betra trygdina á flogvøllinum. Feløgini eru eisini samd um at í minsta lagi glíðibreytarútbúnaður v.m. eigur at fáast til vega.

Undirritaði hevur heitt á Finnboga Nielsen, stjóra á Vága Floghavn (SLV), og á Magna Arge, stjóra á Atlantic Airways, um viðmerking teirra til frágreiðingarnar.

Finnbogi Nielsen metir at skilabesta loysn er at leingja vøllin, heldur enn bert at gera íløgu í glíðubreyt v.m., tí verður glíðibreyt sett upp «áðrenn vøllurin er longdur», verður kostnaðarmikið, helst fleiri milliónir kr. og strevið seinni at flyta gjørdar innstallatiónir o.a. Finnbogi minnir landsstýrið samstundis á, at tólini, sum vóru nýtt til at royndarkoyra glíðibreytina, framvegis eru á goymslu á flogvøllinum fram til 1. mai í ár. Er støða ikki tikin til hvat skal henda á økinum áðrenn henda dag, verða tólini send av landinum aftur.

Finnbogi Nielsen*, stjóri á Vága Floghavn viðmerkir eisini, at altjóða rákið er, at ein ikki byggir stórar vall ir longur. Tilfarið á flogførum verður lættari og lættari, og »start-off« vektin verður minni, eisini tí nýggju flogførini eru orkusparandi. At leingja vøllin í Vágum við 200 m metir hann hóskandi til tey flogfør sum nýta vøllin.

Magni Arge sigur at flogvøllurin er nóg langur til flúgvaran, sum Atlantic nú nýtir. Um hugsað verður um framtíðar tørvin er neyðugt at leingja vøllin, soleiðis at tilber at nýta t.d. stórri flogfør, og aðrar typur av

* Síða 20.21. Vagur Lufthavn - Færoerne Banelængdeberegning. Statens Luftfartsvæsen, 1988.

* Telefonsamrøða 02.02. 1998.

flogførum.

4. Løgtingssamtykt og 1988 frágreiðingin

Ein meiriluti á tingi samtykti 30. mai 1995, við 26-0 atkvøðum, soljóðandi: *»Álagt verður landsstýrinum við støði í frágreiðingini frá Statens Luftfartsvæsen dagfest 8. januar 1988 at kanna kostnaðin av eini flogbreytarøking í Vágum til 1450 m í 1995- prísum, og mett um kostnaðarlut landskassans í eini slíkari útbygging«.*

Hetta kundi bent á, at meiriluti er á tingi fyri at leingja flogvøllin í Vágum við 200 m.

Møguleikin at leingja vøllin til 1800 m varð eisini viðgjørdur í frágreiðingini frá 1988. At leingja vøllin til 1800 m, ella við 550 m, er størsti útbyggingarmøguleiki á flogvøllinum yvirhøvur. Ætlandi verður vøllurin longdur 120 m móti Sørvági og 430 m móti vatninum. Mettur kostnaður er 320 mió. kr.[1] (uttan gliðibreyt). Roknað verður við at projektið gevur arbeiði til 200 fólk í eini fýra til fimm ár.

Møguleikin at leingja vøllin til 1800 m hevur **ikki** verið umrøddur seinnu árini, og tykist ikki at verða aktuellur í heila tikið.

5. Flogvøllur á Glyvursnesi

5. 1. Frágreiðing frá 1973

Ein nevnd sett av danska ferðsmálaráðnum gjørdi í 1973 eina samfelagsbúskaparliga meting av, hvar skilabest var at leggja ein framtíðar flogvøll í Føroyum[2]. Alternativar loysnir til flogvøllin í Vágum, er flogvøllur á Glyvursnesi, á Nesi ella í Sørvuvík. Niðurstøðan var, at tað samfelagsbúskaparliga er skilagott at flyta flogvøllin og serliga til Glyvursnes. Grundað á, at:

- flest fólk í Føroyum fáa styttri ferðaleið til flogvøllin, sum merkir lægri rakstrarútreiðslur av flutningi til vøllin, og tessvegna lægri ferðaseðlaprísir
- vinnumøguleikarnir betrast yvirhøvur, og
- betri reglusemi verður, sum hevur við sær minni spilta arbeiðstíð og hægri nýtslu hjá ferðandi í Føroyum[3].

5. 2. Frágreiðing frá 1987

Í frágreiðing sum Tórshavnar býráð lat gera í 1987[4] verður sagt, at flogvøllur á Glyvursnesi gevur munandi betri flogviðurskifti, enn flogvøllurin í Vágum. Við hesum (størra) vøllinum kunnu fleiri ymisk sløg av flogførum og størri flogfør nýta vøllin. Flogfør kunnu lastast tyngri við frakt og brennievni. Kappingarføridð betrast tí flogfør røkka nýggjum ferðamálum (destinationer) í t.d. Svøríki, Onglandi og Evropa annars. Møguleiki verður fyri:

- leigulúgving til eitt nú Miðjarðarhavsøkið,
- menning av útflutningsvinnuni, tí vinnan gagnnýtur betraðr leveransutreytirnar,
- og vøkstur verður í ferðafólkatalinum (umf. 10%).

Møguleikar verða nevndir at gera vøll uppá 1600, 1800, 2000, 2200 og 3000 m. Kostnaðarmeting verður bert gjørd fyri ein vøll uppá 1800 m við 150 m trygdaroki. Sjálvur vøllurin er mettur at kosta 393 mió. kr, og útbúnaður 156 mió. kr., ella 549 mió. kr. Uppí í hesum eru ikki útreiðslur til vegagerð til flogvøllin, sum leysliga er mettur til at kosta millum 50 til 100 mió. kr.[5], ella ein samlað fløga uppá millum 600 og 650 mió. kr[6].

6. Figging o.a.

Flogmál er felagsmál og rekur Statens Luftfartsvæsen floghavnina. Eftir verandi skipan rindar státurin allar íløgur, meðan landskassin bert rindar fyri ognartøku av lendi og vegagerð, í samband við broytingar av flogvøllinum.

Peningur er ikki játtaður til gliðibreyt v.m. ella til leingjan av flogvøllinum, í hvørki donsku ella føroysku fíggjarlógini fyri 1998.

---

[1] Roknað í 1988 prísum. Við flogi í gliðibreyt + aðrar íløgur í samband við gliðibreyt, verður samlaður kostnaðurin sostatt umt. 367 mió. kr.

[2] Placeringsmuligheder for færøsk lufttrafik, Trafikministeriet, 1973.

[3] Spurningurin um reglusemi má kannast betri áðrenn slík niðurstøða kann gerðast.

[4] Lufthavn på Glyvursnes, Forbeta Skaaning, A/S Anders Nyvig, 1997.

[5] Henning Jacobsen, munnlig viðmerking á fundi í landsstýrinum 23.01. 1997.

[6] Roknað í 1987 prísum.

Mettur kostnaður landskassans fyri »glíðibreytarloysnina« er **3,7 mió. kr.**[16], og fyri keinggan av flogvøllunum við **200 m II mió. kr.**[17]

Nevnd sett av ferðslumálaráðnum skrivaði í 1973[18], at eftir teirra tykki eigur stýring og fígging av flogvallarmálum í størri mun at fara á føroyskar hendur, grundað á at føroyingar stýra útviklinginum av vinnuni, - t.d. ferðavinnu, og at føroyingar fáa flestu fyrimunir av einum nýggjum flogvølli, t.d. í mun til danir.

Tikið verður soleiðis til á síðu 84, *»..... med rimelighed kan skønnes, at i hvert fald over 60% af fordelene ved en ny lufthavn tilfalder det færøske samfund som helhed eller dets enkelte borgere, og det må være ønskeligt at lade økonomisk ansvar, økonomiske fordele og styringsmuligheder være så tæt sammenknyttede som muligt, skal udvalget anbefale, at det færøske samfund i så stor udstrækning som praktisk muligt inddrages i alle faser i den fremtidige lufthavnspolitik, herunder finansiering af nyt lufthavnsanlæg.«*

Donsku ferðslumálaráðharrarnir hava á fundum við landsstýrið í 1996 og 1997, borið sonn sjónarmið fram viðvíkjandi fíggingini.

7. Nýggjur flogvøllur í Føroyum - tíðarhorisontur[19]

Verður nýggjur flogvøllur í Føroyum umhugsaður, er ein ávísur tíðarhorisontur fyri nær ein slíkur kann takast í nýtslu.

Rættast er helst at taka støði í kanningini, sum varð gjørd í 1973. Hon er tann breiðasta kanningin sum er gjørd, men menningin innan flogtøkni, bæði viðvíkjandi flogførum og tólum ger, at henda kanning má endurskoðast, um hon skal nýtast til støðutakan nú. Hósini er tørvurin á flogferðslu og flogfrakt helst munandi øðrvísi nú.

Stigini fram til ein nýggjan flogvøll í Føroyum kunnu setast upp, sum vist niðanfyri:

1. Ymsar kanningar
2. Frágreiðing og niðurstøður
3. Politisk viðgerð og støðutakan
4. Projektering
5. Bygging

Ad 1. Kanningar mugu gerast av veðurlíkindum, sýni, skýhædd og vindi á høskandi støðum. Slíkar kanningar mugu gerast í 5 ár fyri at fáa haldgott tilfar.

Ad 2. Út frá kanningunum mugu frágreiðingar og niðurstøður gerast, um hvussu umstøðurnar eru á einstoku plássunum. Hetta arbeiðið er so mikið umfatandi, at tað helst er neyðugt at seta eitt serstakan arbeiðsbólk til hetta. Um gjørligt eigur Statens Luftfartsvæsen at vera drigið ina í arbeiðið. Arbeiðið kann metast at taka 1 ár.

Ad 3. Politiska viðgerðin kann helst gerast drúgv, men má fevna m.a. um at taka dagar í millum fyrimunir og vansar við møguligu støðunum, har ein flogvøllur kann vera. Samstundis má spurningurin viðvíkjandi ognarviðurskiftum, fígging og rakstrarhátti avgreiðast. Út er at siga hvussu drúgt hetta er, men kanska 2 ár.

Ad. 4. Projektering, útboð og sáttmálar eru "standard" fyri slík projekt og kann neyvan fremjast skjótari enn eftir 2 árum.

Ad. 5. Byggingin fevnir um vegir, vøllur, byggibúning av lendi til bygningar, bygging av terminalum, hangarum, garagum o.l., torn v.m., innlegging av ljósi, samskiftisútgerð, lendingartólum o.l. Mest tíðarkrevjandi av hesum er útleggsarbeiðið, já mun taka eini 4-5 ár. Hini arbeiðini kunnu partvís gerast samstundis og

[16] Ognartøka av lendi 700 tús. kr. og vegagerð 3,0 mió. kr.

[17] Ognartøka 3,0 mió. kr. og vegagerð 8,0 mió. kr.

[18] Síðu 84, Placeringsmuligheder for en færøsk lufthavn, Trafikministeriet, 1973.

[19] Dávid Reinert Hansen, verkfrøðingur hjá Landsverkfrøðingin hevur skrivað hesa partin.

nýtist ikki at leingja byggitíðina so munandi.

Samlað tíðarskeið til stigini, ið nevnd eru omanfyri, kann metast til at verða eini 14 til 16 ár, alt eftir hvussu gongd fæst á málið.

Fíggjarliga krevst at játtan er tøk í fyrsto syftu til at fremja kanningarnar (1. petti), og síðan til at lata arbeiðsbólkin (a-ráðgevarar) gera frágreiðingar og niðurstøður (2. petti). Projektering og bygging krevur sjálvsagt sítt, men tað liggur longur frammi.

8. Politiskt státus*

Ferðslumálaráðharrin gjørdi á fundi í landsstýrinum í august 1996 póra greitt, at danir kenna ábyrgd av, at flogvøllurin er so væl útbygdur, sum rímiligt er at krevja, metti eftir tørvi, og hvat er fíggjarliga ráðiligt. Viðvíkjandi møguligum nýggjum flogvølli á Glyvursnesi varð sagt, at ynskja føroyingar eitt annan flogvøll, so skilja danir hetta sum eitt føroyskt mál, sum føroyingar sjálvir skulu gjalda, og at teir hvørt eru sinnaðir at gera íløgu í verandi flogvøll.

Á fundi í ferðslumálaráðnum 18. apríl 1997 bar landsstýrismaðurin í samferðslumálum fram ynski um at leingja flogvøllin í Vágum 200 m, soleiðis at hann gerst 1450 m, og at glíðibreyt verður fingin til vega.

Tað týdningarmesta, sum kom burturúr hesum fundi var, at danir lovaðu sum skjótast at fara undir praktiskar royndir við eini glíðibreyt og, um so var, at royndirnar góðu góð úrslit, so vildu teir játta pening til gerð av glíðibreyt í Vágum. Hinvegin hava teir ikki tikið endaliga støðu til, um teir eisini vilja leingja vøllin.

Samanum tikið sær tað út til, at landsstýrið hevur góðar møguleikar at fáa glíðibreytina gjørda, har danir bera megin partin av kostnaðinum, meðan málið um leingjan av vøllinum framvegis er ógreiddur.

Viðmerkjast kann, at ferðslumálaráðið[2] sigur, at grundin til, at peningur ikki er settur av til flogvøllin í Vágum í 1998, er fyrst og fremst tann, at teir ikki vita, hvørjar framtíðarætlanir føroyingar hava á økinum. Skrivstovustjórin skjeyt upp sum loysn á hesum máli, at landsstýrið í skrivi til ferðslumálaráðharran greitt tilskilar, hvat landsstýrið ynskir. Hann legði aftrat, at um føroyingar ikki hava støkkligar ætlanir um at byggja annan vøll næstu árini, skal tað eisini tilskilast.

Havandi í huga tíðarhorisontin, ið krevst, um ein ætlar at byggja annan flogvøll, kann hetta ikki hava avgerandi ávirkan.

Samferðslubólkurin, sum er settur at gera eina verkætlan fyri almennu samferðsluna, fer eisini at viðgera flogmál og flogvallarviðurskifti í framtíðini sum heild.

9. Tilmæli til løgmann

Flogsamhandið er okkara einasta ferðasamband við umheimin stóran part av árinum. Tí er av alstórum týdningi, at flogvallarviðurskiftini eru so góð sum gjørligt.

Mælt verður til, at løgmaður boðar ferðslumálaráðharranum frá, at landsstýrið ynskir at flogvøllurin í Vágum verður longdur 200 m, soleiðis at hann gerst 1450 m, og at fingið verður til vega lendingarhjálparamboð, tvs. glíðibreyt v.m. Víst verður á, at ferðslumálaráðharrin hevur ábyrgd av, at vøllurin tekniskt og á annan hátt, er á so høgum støði sum gjørligt. Við hesum íløgum betrast flogviðurskiftini, tí bæði flutningskapasitetarin og reglusemið betrast.

Vinnumálastýrið, 06.02.1998

Atli Eiríksson

fulltrúi

100-13 Fyrispurningur til Eilif Samuelsen,

* Hetta er ein samandráttur av frágreiðing um politiska status í málinum um møguligar flogvallartúbyggingar. Sigmund Isfeld. Juristur. 02.02. 1998.

[2] Telefonsamrøða við Niels Rener, skrivstovustjóra í Fiskimálaráðnum, 03.02. 1998.

landsstýrismann viðvíkjandi HF- og studentaskúlanæmingum, sum ikki sleppa í skúla, hóast kravda sparingin er framd

Ár 1998, friggjadagin 16. januar 1998 boðaði formaðurin frá omanfyri nevndu fyrispurningi frá Signar í Brimi, løgtingsmanni, sum var soljóðandi:

Hvør er orsøkin til, at umleið 900 næmingar í HF- og studentaskúlunum ikki sleppa í skúla allur, nú ið skúlarnir hava spart ta upphædd, ið landsstýrið kravdi skuldi sparast?

Viðmerkingar
Næmingarnir á HF- og studentaskúlunum í Føroyum eru hart raktir av tí verkfalli, sum er sett í verk, nú tíðin styttist, til prógvtøkurnar byrja.

Landsstýrismaðurin í skúlamálum, Eilif Samuelsen, sum hevur ábyrgdina av skúlaverkinum, hevur skyldu til at bera so í bandi, at næmingarnir so skjótt sum møguligt sleppa aftur í skúla, tí teir kunnu ikki missa meira av skúlatíðini, enn teir hava gjørt.

Grundgevingin fyri, at broytingar skuldu fremjast í HF- og studentaskúlanum í Eysturoy, var hon, at játtanin til nevnda skúla var ov lág.

Verkfallið, ið varð sett í verk, hevur borið í sær, at landsstýrið hevur ikki goldið løntir til lærararnar í verkfalstíðini, tí tað hevur yrkisfelag læraranna gjørt. Við øðrum orðum, er tann játtanin, ið landsstýrið vantaði, fingin til vega.

Tá so er, hevur undirritaði ilt við at skilja, hví áðurnevndu skúlar ikki kunnu byrja skúlagongdina aftur.

Spurningar, ið liggja uttan fyri tann fíggjarliga, t.e. játtanina í hesum árinum, kunnu so landsstýrið og yrkisfelagið taka uppaftur, eftir at næmingarnir eru byrjaðir skúlagongdina aftur.

20. januar 1998 varð við 23-0-0 atkvøðum samtykt, at fyrispurningarin skuldi svarast.

27. januar 1998 svaraði Eilif Samuelsen, landsstýrismaður, fyrispurningunum soleiðis:

Fyrí at svara spurningin er neyðugt at líta eitt stundar aftur eftir.

Várið 1997
Undan upptøkufunditnum á Landsskúlafyrisitingini tann 16. apríl 1997, har tey endaligu umsøkjaratølini vóru til skjalsfyrilógu Tá ið tann samskipaða tilmeldingin var úti 15. mars 1997 (?), býttu umsóknirnar til Studentaskúlan og HF-skeiðið í Eysturoy seg sundur soleiðis:

Sundurbýting millum:	Tal av umsøkjarum:
	Egnaðir umsøkjarar, 1. prioritet:
Málsligar umsøkjarar	28
Støddfrøðiligar umsøkjarar	33

Av tí at aðrir miðnámsskúlar høvdu fleiri umsøkjarar, enn peningur var settur av til á løgtingsins fíggjarlóg fyri 1997, var neyðugt at kanna nærri, um tað var gjørligt at útvega møguleika fyri, at hesir næmingar kundu verið tiknir upp. Eftir at millum annað avtalan um fíggjarkarmarnar var endaligu samtykt, varð hetta máliið loyst.

Komið var nú út í til 20.um hálvan mai. Skúlarnir fingu síðani boð um, hvussu nógvar flokkar teir kundu taka inn. Studentaskúlin og HF-skeiðið í Eysturoy fekk boð um, at teir kundu taka 2 nátsligar og 2 støddfrøðiligar flokkar inn, men at roknast skuldi við, at teir støddfrøðiligu flokkarnir vóru lagdir saman seinni í fíggjarárinum.

August 1997
Í samband við at uppskot til løgtingsins fíggjarlóg skuldi gerast, var boð m.a. givið til Studentaskúla- og HF-skeiðið í Eysturoy, at teir báðir støddfrøðiligu 1.S-flokarnir fóru at verða lagdirskuldu leggjast saman í seinasta lagi um árslok 1997. Rektarin heitti á lærararnar, ið hevdu hesar báðar flokkarnar, um at lesa sama pensum, nýta somu bøkur o.a. (sí skjal nr. 1). Talið á næmingunum var nú komið niður á 28.

Desember 1997
Undirvísingar- og mentamálastýrið setti seg tann 16. desember 1997 í samband við Yrkisfelag Studentaskúla- og HF-lærara, fyri at boða frá, at ætlanin er at leggja flokkarnar saman. Á fundinum, ið var tann 17. desember 1997, greiddi Undirvísingar- og mentamálastýrið frá, at Yrkisfelagið hevði havt eina avtalu við Landsskúlafyrisitingina, frá 25. september 1992 (skjal nr. 2) um m.a. tal av næmingum í einum studentaskúlaflokki, men at Yrkisfelagið sjálvt hevði sagt avtaluna upp í skrivi, dagf. 9. mai 1997 (skjal nr. 3). Hesum gav Yrkisfelagið Undirvísingar- og mentamálastýrinum so at siga rætt í, men segði, at ætlanin ikki var, at uppsøgnin skuldi fevna um hesa avtalu, men at tað kundi skiljast so, sjálvt um tað ikki var ætlanin frá Yrkisfelagsins síðu.

Á hesum fundi fekk Undirvísingar- og mentamálastýrið at vita frá Yrkisfelagnum, at felagið hevði gjørt eina aðalfundarsamtykt í september 1997, sum segði nokuð um limum felagsins at undirvísa flokkum størri enn 24 næmingum. Hetta var Undirvísingar- og mentamálastýrið ikki kunnugt við og var sera hitsið um eina slíka aðalfundarsamtykt, ið gekk beint í móti tí, sum ætlanin hevði verið síðani á vári 1997. Hóast hetta heitti Undirvísingar- og mentamálastýrið á Yrkisfelagið um at taka undir við hesum.

Tann 18. dDesember 1997 fekk Undirvísingar- og mentamálastýrið boð aftur frá Yrkisfelagnum, at teir undir onguni umstøðum kundu taka undir við hesum og vístu m.a. til aðalfundarsamtyktina frá september 1997 (skjal nr. 4). Tá ið Yrkisfelagið breyt dialogin av við Undirvísingar- og mentamálastýrið á henda hátt, hevði stýrið einki annað val enn at fremja ætlanina, sum longu boðað var frá frammanundan.

Januar 1998
Í útvarpstíðindunum Nýggjársdag 1998 um kvøldið frættir Undirvísingar- og mentamálastýrið at Yrkisfelagið noktar øllum limum sínum at fara til arbeiðis frá 5. januar 1998 at rokna tá ið jólafrítíðin varer av). Í skrivi frá Yrkisfelagnum, dagf. 1. januar 1998, ið er sent Undirvísingar- og mentamálastýrinum um kvøldið (skjal nr. 5), har m.a. verður boðað frá, at »at vit fara aftur til arbeiðis, tá ið flokkarnir aftur eita 1.x og 1.y og eru, sum teir vóru fyri jól«.

Tann 6. januar 1998 fær Undirvísingar- og mentamálastýrið telefaks frá Yrkisfelagnum við áheitan um at koma á fund. Undirvísingar- og mentamálastýrið svarar hernanvegin, at »Undirvísingar- og mentamálastýrið vil koma á fund við Yrkisfelagið, tá ið limir felagsins hava tikið arbeiðið upp aftur.« Tað ber, sum kunnugt, ikki til hjá arbeiðsgevara at fara á fund við eitt fakfelag, ið er í verkfalli, sum stríður í móti sáttmálanum. At fara á ein slíkan fund er tað sama sum at viðurkenna verkfallið. Royndi verður umvegis saklýsarara Yrkisfelagsins at greiða teimum frá, at fundir/samráðingar kunnu ikki fara fram, meðan felagið er í ólógligum verkfalli. Hetta verður felagnum greitt og verður verkfallið avlýst fríggjakvøldið tann 9. januar 1998 á miðnátt. Avtalað verður, at Yrkisfelagið og Undirvísingar- og mentamálastýrið saman við lønarteldini í Fíggjarmálastýrinum, ið umsitur sáttmálaøkið, skuldu hava ein forfund fyri at roða um, hvørjair loysingsmøguleikar partarnir kunnu semjast um at tingast viðarri um næsta dag. Á hesum fundi komu fram fleiri skilagóð hugskot til loysn á trætuni, ið báðir partar vóru samdir um at tingast nærri um næsta dag.

Leygardagin tann 10. januar 1998, kl. 19.00 motast partarnir, og byrja tingingarnar umt. kl. 20.00. Tey ekini, ið partarnir høvdu avtalað frammanundan, leyp Yrkisfelagið frá og boðaði frá, at tað hevði bert eitt uppskot, og tað var, at landsstýrismaðurin í skúlamálum fór niðan í tinggjarnevndina/løgtingið og hað um eina eykajáttan, ið svaraði til, hvat tað kostaði at hava tveir flokkar í staðin fyri ein flokk. Umboðini fyri Føroya Landsstýri royndu at fáa tey punktini, ið semja hevði verið fyri at tingast um kvøldiðlagin fyri fram á borðið, men til fánýtis. Umboð landsstýrisins bjóðaðu at leggja málið fyri ein gerðarrætt, men hesum sýtti Yrkisfelagið fyri. Myndugleikamna umboð komu síðan fram við uppskoti um at fáa ein seningsmann uppí, men hetta varð eisini avvíst frá Yrkisfelagnum. Longu kl. 22.20 sama kvøld sleit Yrkisfelagið samráðingarnar og boðaði frá, at teir fóru aftur í verkfall mánamorgunin, tann 12. januar 1998. Sakførin hjá Yrkisfelganum, ið eisini luttók á fundinum, royndi at fáa tingingarnar tikrar upp aftur, við at koma við uppskoti um at finna eina meira fasta loysn frá 1. august 1998. Umboð landsstýrisins spurdu, um tey kundu arbeiða víðari við hesum og venda aftur við einum uppskoti. Hetta varð góðtikið.

Við tað at tingingarnar vóru so fastlærstar frá Yrkisfelagsinsnum síðu, valdu umboð landsstýrisins at senda boð eftir landsstýrismanninum í skúlamálum, og kom hann beinanvegin. Eitt uppskot um at báðir partar skuldu seta seg niður og koma fram til eina avtalu um, hvussu næmingatalið í studentaskúlunum skuldi skipast frameftir, varð lagt fram av Undirvísingar- og mentamálastýrinum. Hetta uppskot góðtók Yrkisfelagið heldur ikki og kom við einum mótuppskoti um, at »undirvísingin heldur fram sum fyri jól [2 flokkar í staðin fyrí 1] og at partarnir tingast um øll viðurskiftir sum skilja partarnar«. Landsstýrisins umboð boðaðu frá, at tey skiltu ikki hetta »tilboð«. Tí nú skuldi Yrkisfelagið ikki hevt hava støðuna, sum hon var fyri jól, men eisini kunna tingast um øll møgulig mál, t.v.s. at veruligar sáttmálatingingar skuldu nú kunna fara fram, miðskeiðis í einum sáttmálaskeiði. Hóast hetta lógnat uppskot valdu myndugleikamna umboð at koma fram við einum broyttum uppskoti um, »at undirvísingin verð tikin uppaftur sum ásett av myndugleikunum eftir 1. januar 1998, og at partarnir kundu tingast um tað, sum teir báðir vóru samdir um, at teir vóru ósamdir um.« Hetta uppskot vrakaði Yrkisfelagið og boðaði kl. 02.10 frá, at stoðan var óbroytt síðan kl. 22.20, og at teir hervið slitu samráðingarnar og fóru aftur í verkfall. Yrkisfelagið boðaði eisini frá, at teir víðkaðu verkfallið til eisini at fevna um uppgávunevnd í sambond við prógvtøkuuppgávur o.a. Viljin var slætt og rætt ikki til staðar hjá Yrkisfelagnum til at tingast við myndugleikan.

Landsstýrið hevur síðan í telefaksi - 19. januar 1998 - heitt á Yrkisfelagið og sakførara tess, um at steðga við verkfallinum og koma aftur til samráðingarborðið. Svar er komið aftur frá Yrkisfelagnum um, at teir vilja koma at tingast við landsstýrið, men ikki við teimum treytum, sum landsstýrið setur í løtuni. Landsstýrið hevur ongar treytir sett, men bert víst á, at tilboðið um at leggja málið fyri ein gerðarrætt, ella at fáa ein seningsmann uppí, framvegis stendur við, hóast Yrkisfelagið framvegis er í verkfalli.

Samanumtikið

Kjarnin er, at framferðin hjá YF í hesum máli stíðir móti grundleggjandi reglum. Tá partarnir hava gjørt sáttmála, er friðarskylda, og merkir hetta, at tað ikki er loyvt at fara í verkfall, fyrr enn sáttmálin er farin úr gildi. Um ósemjur stinga seg upp í sáttmálatíðarskeiðinum, er tað ein grundleggjandi regla í arbeiðsrættinum, at tulkingin hjá arbeiðsgevaranum er galdandi. Um fakfelagið ikki kann góðkenna arbeiðsgevarans tulking, kann felagið krevja, at málið verður roynt í gerðarrætti, sum ger úrskurð. Men su leingi gerðarrætturin ikki er komin til rakna niðurstøðu, er tað tulkingin hjá arbeiðsgevaranum, sum er galdandi. YF hevur sáttmála við Fíggjarmálastýrið um lønar- og setanarviðurskifti, sum ikki kann sigast upp fyrr enn til 1. mars 1999. Tí er ikki loyvt at nýta verkfall sum ambað í hesum føri, men eigur felagið at krevja, at málið verður avgjørt í gerðarrætti, um tað er ósamt um eina tulking. Hetta vil Yrkisfelagið ikki, og hevur tað ongantíð veruliga viljað samráðst við landsstýrið, men hevur í staðin fyri viljað lagt tryst á myndugleikan gjøgnum fjølmiðlarnar.

Eydnast tað Yrkisfelganum at trýsta myndugleikan í hesum føri, er tað ventandi, at onnur fakfelog fara at nýta sama framferðarhátt, tá ið tey eru ósamd við landsstýrið. Tað hevði verið ein vanlukka, sum lættliga

kundið fingið óyvirsýniligar avleiðingar.

Sum kunnugt er næmingatalið í students- og HF-flokkunum fleiri enn 24 í grannalondum okkara. Eitt nú er tað vanligt, at tað eru 28 næmingar í slíkum flokkum í Danmark. Í Noreg er talið 30. Miðal næmingatalið í Føroyum er 17, meðan tað í Danmark er omanfyri 24.

Orsøkin til, at næmingarnir ikki sleppa aftur í skúla, er tann einfalda, at málið frá at snúgva seg um eitt sparingar- ella rationaliseringstiltak ikki longur bert snýr seg um tað fíggjarliga, men er eisini orðið ein spurningur um, hvør hevur leiðslurættin, og um Yrkisfelagið kann nýta eitt ólógligt verkfall í sáttmálaskeiðinum til at trýsta sín vilja ígjøgnum. Hetta hevur Yrkisfelagið gjørt tað til við at fara í verkfall, uttan ávaring, og við at sýta fyri at vilja royna veruligar samráðingar.

100-14 Fyrispurningur til Edmund Joensen, løgmann, viðv. avtalum millum løgmann og statsministaran

Ár 1998, mikudagin 4.februar boðaði formaðurin frá omanfyri nevnda fyrispurningi frá Álvi Zachariasen, løgtingsmanni, sum var saljóðandi

1. Eru avtalur gjørdar millum løgmann og statsministaran um mál, ið viðvíkja komandi samráðingum miltum Føroya landsstýri og donsku stjórnina?
2. Um so er, verður heitt á løgmann um at upplýsa fyri løgtinginum, hvørjar hesar avtalur eru, og hvørjit mál tær snúgva seg um.
3. Hevur løgmaður t.J. bundið seg til at viðgera føroysku landskassaskuldina og endurgjald í bankamálinum undir einum?
4. Hevur statsministarin givið nøkur lyfti um at lætta um føroysku skuldarbyrðuna til næstu samráðingar?
5. Um so er, hvørji lyfti hevur hann givið?

Viðmerkingar
Í sambandi við seinastu vitjan Poul Nyrup Rasmussens í Føroyum standa enn nógvir ósvaraðir spurningar. Hvat vildi hann her, og hvørjar avtalur vórðu gjørdar millum hann og løgmann?

Tað, sum serliga hevur áhuga, er, um løgmaður og statsministarin hava gjort avtalur í sambandi við komandi samráðingar millum Føroyar og Danmark. Um so er, er tað av stórum týdningi, at løgmaður ikki arbeiðir í sjálvdrátti hesum viðvíkjandi.

Løgtingið eigur at verða kunnað í góðari tíð frammanundan um føroyska samráðingaruppleggið, tí tað verður ikki hetta landsstýrið og hendan samgongan, sum koma at standa við ábyrgdini fyri at seta samráðingarúrslitið í verk.

Harafturat eru stór mál á skránni. Løgtingið hevur krav uppá at vita til fulnar, hvussu landsstýrið ætlar at samráðast um føroysku skaldina, og tað hevur alstóran týdning at fáa greiðu á, um løgmaður ætlar at tengja samráðingar um uttanlandsskuldina saman við spurninginum um endurgjald í bankamálinum.

Hesum vil Sjálvstýrisflokkurin ávara ímóti.
Bankamálið er átrokandi. Kann løgtingið vænta, at landsstýrið fer at seta hetta mál í fyrstu rað? Og kann løgtingið vænta, at avtalan millum Føroyar og Danmark í sambandi við endurgjald fyri bankamálið verður

løgd fyri løgtingið til góðkenningar og samtyktar? Í hesum máli eiga allir flokkar at standa saman sum ein eind.

Skuldin til danska statin er ein tyngjandi byrða fyri landskassan, tí eigur løgtingið at fáa eina ábending um, hvussu landsstýrið ætlar at loysa hendla trupulleika, soleiðis at vit vita, hvat vit kunna at ábyrgdast fyri í framtíðini.

Friggjadagin 13. februar 1998 varð við 31-0-0 atkvøðum samtykt, at fyrispurningurin skuldi svarast.

Fyrispurningurin varð ikki svaraður, fall hvørt sbr. stýrisskipanarlógini § 15 stk. 3, tí at løgtingsval var 30. apríl 1998.

100-15 Fyrispurningur til Edmund Joensen, løgmann, viðv. farleiðini Føroyar/Skotland

Ár 1998, friggjadagin 13. februar 1998 handaði formaðurin frá umanfyri nevnda fyrispurningi frá Signar á Bráni, løgtingsmanni, sum var soljóðandi

1. Hevur sitandi landsstýrið nakrar ætlanir um, at farleiðin Føroyar/Skotland verður tikin uppaftur, nú ið Skipafelagið Føroyar hevur avritt at steðga siglingini?

2. Um svarið er játtandi, kundi løgmaður í stuttum greitt løgtinginum frá, hvørjar tær eru?

3. Um svarið er noktandi, hevur landsstýrismaðurin í samferðslumálum, ið er løgmaður, gjørt sær greitt, hvørjar avleiðingarnar verða fyri føroyska vinnulívið?

Viðmerkingar
Farleiðin Føroyar/Skotland hevur fingið nógva umrøðu á tingi. Frá ið hon varð stovnsett, var, sum vera man, drigt orðaskifti um hana. Meðan Fólkaflokkurin umsat samferðslumál í landsstýrinum varð farleiðin stovnsett.

Føroyingar sum heild hava verið sera væl nøgdir við hesa farleið. Væntað varð, at tað tók sína tíð at byggja slíka farleið upp, og at hon tey fyrstu árini fór at hava hall, men sum tíðin leið, fór hallið at gerast minni. So hevur eisini verið. Seinastu tolini frá Strandfaraskipum Landsins sogdu okkum, at hallið tvey tey seinastu árini, sigið varð, var 2,4 mió. kr., og mong vóru tey, ið væntaðu, at um hildið varð fram, so fór hallið at gerast til eitt yvirskot.

Men so brádliga boðaði hetta landsstýrið frá, at farleiðin Føroyar/Skotland í tí líki, fór at halda uppat, og at Skipafelagið Føroya fór at taka yvir.

Løgtingsins tíggjarnevnd varð kunnað um, at allir flokkar í samgongunni vóru samdir um at taka hetta stig. Flokkurin, ið umsat málsøkið og hevði ábyrgdina av tí, var Sjálvstýrisflokkurin. Hinir vóru Fólkaflokkurin, Sambandsflokkurin og partur av Verkamannafylkingini.

Hóast royndir vórðu gjørdar í tinginum, m.a. av Tjóðveldisflokkinum, at forða fyri, at nevnda farleið varð steðgað, so eydnaðist tað ikki.
Nú verður boðað frá, at Skipafelagið Føroyar ætlar ikki at halda fram við farleiðini, tí hon kastar ikki tað av sær, ið felagið hevði væntað. Tvørturímóti vísa tolini á eitt hall.

Men tá ið slíkt hendir, at so týdningarmikil farleið verður logd niður frá degi til dags, so kunnu avleiðingarnar hjá teimum, ið hava nýtt farleiðina gerast ógvuliga álvarsligar. So gordist eisini hesa ferð. Fleiri av fremstu monnum innan fiskivinnuna á landi hava gjort vart við seg og vísa á, at um siglingin til Aberdeen ikki heldur fram, gerst tað ein sonn vanlukka fyri fiskivinnuna á landi.

Tá ið stoðan er vorðin so álvarslig, og sitandi samgongu veit, at hon hevur sín stóra part av skyldini, at vit eru komnir út í hetta óførið, so verða hesir fyrispurningar settir løgmanni Edmundi Joensen, við yniski um, at teir verða so skjótt svaraðir sum møguligt.

17. februar 1998 varð samtykt við 26-0-0 atkvøðum, at spurningarin skuldi svarast.

Fríggjadagin 13. mars 1998 svaraði Edmund Joensen, løgmaður fyrispurningunum soleiðis:

til spurningarnar 1, 2 og 3:
Landsstýrið hevur sett sær fyri at leggja millumlandaflutningssambandið á privata hendur.

Ætlan landsstýrisins er, at møguleikarnir fyri ferðafólka- og farmaflutningi verða øktir munandi. Landsstýrið hevur tí sett 2 mió.kr. av á fíggjarlógini til tess at stuðla fukiliga setlan hjá Atlantsflog um flúgving til Skotlands til tess at menna møguleikarnar hjá flutningsvinnuni.

Viðvíkjandi farmaflutninginum til Skotlands so hevur Skipafelagið Føroyar ikki steðgað hesi rutu. Siglingin heldur fram við reglutigari farmasigling til Skotlands einaferð um vikuna.

Somuleiðis er Atlantsflog í holt við fasta flogleið millum Føroyar og tvinnar býir í Skotlandi: Glasgow og Aberdeen. Hetta verður roynt í tveir mánaðir í summar. Harumframt hevur Smyril Line lagt summarsiglingina hjá Norrøna um, soleiðis at farleiðin til Hetlands verður tikin uppaftur á leiðini millum Føroyar og Danmark (Hanstholm).

Alt hetta her í sær, at sambandið við Skotland er á fleiri hondum enn tað var, tá tað almenna hevði megin partin av flutningunum um hendi, bæði viðvíkjandi ferðafólki og farmi. Sostatt eru útreiðslurnar hjá tí almenna í hesum sambandi minkaðar munandi.

Norrøna siglir hvørja viku til Hetlands í summar. Atlantic Airways flýgur tvær ferðir til Skotlands til tvinnar býir, og Skipafelagið Føroyar hevur farmaflutning til Skotlands einaferð um vikuna alt árið.

Samanumtikið er fleirtáttaða sambandið millum Føroyar og Skotland um at koma í eina legu, sum bæði nøktar tørvin á vinnuligum flutningi alt árið, eins og ferðasambandið á summri er vorðið nógv betri.

Vit kunnu sostatt fegnast um, at vit í dag hava nógv fleiri flutningsmøguleikar, enn vit hovdu við almenna ferðasambandinum.

100-16 Fyrispurningur til Edmund Joensen.

løgmann, viðv. ferða- og farmaflutningi millum Føroyar og Skotland

Ár 1998, fríggjadagin 13. februar 1998 boðaði formaðurin frá umrøddu fyrispurningi frá Torbi J. Niclasen, løgtingsmanni, sum var soljóðandi

1. Hvørjar ætlanir hevur landsstýrið til tess at tryggja møguleikum fyri nøktandi ferðafólka- og farmaflutningi millum Føroyar og Skotland?

Viðmerkingar
Ásannandi, at avgerð samgongunnar um at niðurleggja ferðafólkasambandið millum Føroyar/Aberdeen var sera óhepping og helst hevur skatt undirtøkum Føroya sum ferðaland, var tað, at Miðflokkurin í skrivi, dagfest 14.03.97, og aftur í skrivi, dagfest 09.05.97, heitti á táverandi landsstýrismann í samferðslumálum um at finna eina loysn ferðafólkaflutninginum viðvíkjandi.

Í frágreiðing til Føroya landsstýri «Sjóleiðin til Skotlands» verður m.a. upplýst, at tað ferðast umf. 12.000 fólk árliga við Smyrli til Skotlands, og at alt í alt er ferðafólkatalið til og frá Skotlandi umleið 11% av samlaða ferðafólkatalinum.

Miðflokkurin er av teirri áskoðan, at ferðafólkasambandið Føroyar/Skotland eigur at verða tikið uppaftur og at farmaflutningurin eigur at verða tryggjaður so nøktandi sum gjørligt.

Hvat ferðafólkaflutningi viðvíkir kundi ein loysn verið t.d., at siglingin hert var um summarið einar 4 mánað um árið.

Av strandferðsluni hevur verið upplýst, at slík sigling helst hevði givið eitt halt uppá kr. 600.000.

Tá er roknað við sonnu ferðaseðlaprísum, sum hava verið galdandi, tá Smyril á sinni rokti farleiðina.

Javnvág - kanska eitt avlop - kundi fingist til veiga, við at ferðaseðlakostnaðurin varð hækkaður nakað og annars við øktari tænastu.

Framvegis kundi tá føroyingurin havt møguleika fyri eini «bíligari» ferð til eitt land, har gott og bíligt er at ferðast í.

Umframt, at tað úr Skotlandi er vegasamband til europeiska meginlandið, eigur at havast í huga, at í Skotlandi eru nógvir útbúgvingarstovnar, alternativir vinnumøguleikar og stórir møguleikar fyri sambandi.

Í nevndu frágreiðing, verður m.a. sagt: "tað er tó truplut at seta neyv tøl á ávirkan av betri sambandi við Skotland, men tað er givið, at gott samskifti við Skotland hevur positiva ávirkan fyri føroyska samfelagið á tann hátt, at møguligt er at fáa hægri prís fyri partar av útflutningsvøruni, at møguligt er at fáa bíligari innflutningsvøru. Harumframt gevur samskiftið menningarmøguleikar bæði fyri vinnuna og fyri føroysku mentanina"

Eitt at ivast í, at áhugamál í Skotlandi høvdu havt yvirskipaðan, at ferðaflutningssambandið landanna millum kom í eina nøktandi legu,og kundi tað tí kanska verið eitt hugskot hjá t.d. landsstýrinum at kanna hendan møguleika og fingið eitt skilagott samstarv í lag.

Nú oljuvinnan eisini eftir øllum at dømna stendur fyri durum, eigur landsstýrið at kanna áhyrgd og viðvirka til loysnir, eisini á nevnda øki, sum í síðsta enda uttan iva fara at roynast samfelagsspagnligar.

17. februar 1998 varð samtykt við 24-0-2 atkvøðum, at spurningurin skuldi svarast.

Friggjadagin 13. mars 1998 svaraði Edmund Joensen, fegnaður, fyrispurningunum soleiðis:

Landsstýrið hevur sett sær fyri, at millumlandaflutningssambandið skal vera á privatum hondum.

Ætlan landsstýrisins er, at møguleikarnir fyri ferðafólka- og farmaflutningi verða aktir munandi. Landsstýrið hevur tí sett 2 mió. kr. av á fíggjarlógini til tess at stuðla fókiliga ætlan hjá Atlantsflog um flúgving til Skotlands til tess at økja um tg menna møguleikarnar hjá flutningsvinnuni.

Viðvíkjandi farmaflutninginum til Skotlands, so hevur Skipafelagið Føroyar ikki steðgað hesi rutu. Skipafelagið Føroyar hevur regluliga farmasigling til Skotlands einaferð um vikuna.

Atlantsflog hevur ætlanir um at fara í holt við fasta flogleið millum Vágamar-Glasgow-Aberdeen og aftur til Vágar tvær ferðir um vikuna í tveir mánaðir í summar. Hetta er ein roynd hjá Atlantsflogi at víðka um virksemið. Fær henda flúgving góða undirtøku, so verður henda leið helst tikin uppaftur næstu summrini og møguliga longd.

Landsstýrið metir sambandið við Skotland sera týdningarmikið. Játtanin uppá 2 mió.kr. á fíggjarlógini í ár kann verða nýtt til at hækka partapeningin í Atlantsflogi ella at veita stuðul ella trygd, fyrst og frenst í samband við eina møguliga leinging av flúgvingini út um teir tveir mánaðirnar.

Harafturat hevur Smyril Line skipað farleiðirnar hjá Norrøna í summar soleiðis, at sigli verður til Lerwick í Hetlandi á leiðini millum Hanstholm og Tórshavn.

Alt hetta ber í sær, at sambandið við Skotland verður á fleiri hondum enn tað var, tá tað almenna hevði megin partin av flutninginum um hendi, bæði viðvíkjandi ferðafólki og farmi. Samstundis eru útreiðsluruar hjá tí almenna í hesum sambandi minkaðar munandi.

Tað er at fegnast um, at vit á summri hava nógv fleiri ferðamøguleikar og flutningsmøguleikar enn vit hevdu við almenna ferðaflutninginum.

Í samgonguskjalinum hevur landsstýrissamgongan sett sær fyri, at *«Samferðslan við aðrenin mi verði skipað soleiðis, at hon - á privatum hondum - tryggjar útflutningsvinnuni best møgulig kor.»* Hesin setningur er settur í verk.

100-17 Fyrispurningur til Ivan Johannesen, landsstýrismann, viðv. aling

Ár 1998, hósdagin 19. februar 1998 boðaði formaðurin frá omanfyri nevndu fyrispurningi frá Henrik Old, løgtingsmanni, sum var soljóðandi

1. Hvussu langt er frá føroyskari síðu komið ávegis við aling av kalva?
2. Verða royndir gjørdar, ella eru ætlanir at gera royndir at ala onnur fiskaslog (hurtursæð frá laksaaling)?

Viðmerkingar
Fyri skjótt 11 árum síðani fóru norðmenn í holt við at gera royndir við aling av kalva. Hetta byrjaði við, at ein stórur kalvi, sum «Magnus Heinason» fekk, varð sendur tir Føroyum til Noregs.
Nú skjótt 11 ár aftan á kann ikki sigast annað enn, at rímiliga væl hevur gingið.

Fyritøkan, sum hevur staðið fyri hesum royndum, seldi í 1997 umleið 250 tons av aldum kalva, og í ár kemur sølan upp um 400 tons.

Prísurin á alda kalvanum er heldur hægri enn á tí fiskaða kalvanum, góðar 80 kr. pr. kg. Tað tekur 3 til 4 ár at ala ein kalva upp til ta støddi, ið neyðug er fyri at kunna seljast. Her kann leggjast afturat, at sama fyritøka nú selur túsundir av tonsum av hvasskoysu (pighvara), sum sama fyritøka eisini alir.

Frá føroyskari síðu varð byrjað í smáum við royndum at ala kalva, men hevur einki verið at hoyrt frá hesum royndum seinastu árini.

Nú fiskiskapurin her heima hevur verið góður seinastu 2 árini, tykist tað sum, at alt tos og allar royndir at finna betri og tryggari lívsgrundarlag er stoðgað.

Tí verður hesin fyrispurningur settur landsstýrismanninum í alimálum.

Fríggjadagin 20. februar 1998 varð samtykt við 19 í 0 atkvøðum, at spurningurin skuldi svarast.

Fríggjadagin 13. mars 1998 svaraði Ivan Johannesen, landsstýrismaður, spurningunum soleiðis:

Royndir við kalvaaling 1998-92
Í Føroyum er tað bert P/F Fiskaaling, sum hevur gjørt smávegis royndir at ala kalva. Hesar royndir vóru gjørdar árini 1988-92. Royndirnar vórðu gjørdar undir vánaligum umstøðum á Hvalastøðini við Áir.

Royndirnar staðfestu, at kalvin gýtti í uprít til juni, sum er væl seinni enn t.d. á Føroya Banka. Men hóast seinnu gýtingina eydnaðist tað tó at fáa nakað av góðum rognum á hvørjum ári. Seinna gýtingin hevði tó við sær, at trupult ella ómøguligt var at halda ásetta hitan til kleking av rognum og lagring av ynguli, og at várblómingin av eti var lítið, áðrenn kalvayngulin, sum kom undan, var ferur fyri at taka føði til sín. Samlaða úrslitið av hesum var, at tað eydnaðist ikki at fáa nakað kalvaspjaldur (metamorfoserandur kalvi) undan, men tíð tamgladi í.

Í tíðarskeiðinum frá 1993-96 hevur onki verið gjørt á Fiskaaling við at ala kalva. Orsøkin til hetta er, at felagið í hesum tíðarskeiði hevur gjørt royndir við at ala tosk.

Framtíðarætlanir við kalvaaling
Sum nevnt omanfyri, hevur stoðgur verið í royndunum at ala kalva, orsakað av at øll orkan á hesum øki varð nýtt til royndir við toski. Felagið hevur í prinsippinum avgjørt at fara undir aftur royndirnar at ala kalva, og ætlanin er at byggja eina kalvaalistøð í Nesvík, har øki er gjørt byggibúgvið, eins og longu er gjørd í ymiska tekniska útgerð. Hartil eru fiskaðir nakrir gýtingarkalvar í 1997, soleiðis at samlaða talið av gýtingarkalvum er umleið 30. Eisini hava fólk verið á skeiði hjá norskari royndarstøð, sum er rættiliga frammadaga á hesum øki.

Felagið hevur ætlanir - um fíggjarligur stuðul fæst - um at gera flutgur í omanfyri nevndu kalvaalistøð í eitt 10 ára tíðarskeið og fara undir royndir at strúka, klekja og fóðra kalvayngul, so hvørt sum umstøður eru til hetta.

Víst verður annars til hjálagdu frágreiðingar: »Skitsa til kalvaaling fram móti 2008« og »Aling av sjófiski«.

Viðv. øðrum royndum ella ætlanum at ala onnur fiskasløg
Fiskaaling hevur seinastu 5 árini gjørt royndir at ala tosk, bæði av Føroya Banka og av landgrunninum. Árini 1992-94 øktist talið av yngul, sum kom undan, úr 30.000 upp í 130.000. Árini 1994 og 1995 vórðu 50.000 merktir toskar settir út á Føroya Banka tilsamans. Higartil eru minni enn 2 promillu skrásett sum afturfiskað.

Av teimum 130.000 toskayngulunum í 1994 vórðu 30.000 yngul undan toski av landgrunninum. Fyribils úrslit av vakstrarroyndum vísa, at toskur av Føroya Banka veksur munandi skjótari enn toskur av landgrunninum.

8.400 merktir toskar av landgrunninum vóru steptir til í Sundalagnum, og eru higartil góð 10% skrásettir sum afturfiskaðir.

Fiskaráðið hevur, sum er, ikki manning til at fara undir aðrar aðalmál enn royndir við kalvaráðing.

Stuðul til royndir innan aling
Á fíggjarlógini fyri 1998 eru settar av 14.6 milj. kr til óvísar granskingaraetlanir, sum hava sum endamál at menna føroysku alivinnuna. Fyritøkum standa í boði at søkja um stuðul til hesi endamál:

1. Kynbøtur
2. Samstarv við aljagranskingarstovnar í grannalondum
3. Ráðgeving til landsstýrismannin og rakstur av starvsstovuni við Áir
4. Royndir við aling av nýggjum fiskasløgum
5. Royndir við nýggjum alifokjum
6. Sjúkufyribyrging
7. Góðskingarskipanir
8. Rationaliseringar og effektiviseringar og menning av framleiðslu- og arbeiðsgongdum

Sjálvt um 14.6 mió. kr kunnu vera smáhýttar til so nógv ymisk endamál, so er tað møguligt hjá ráðrum enn Fiskaráðið at fáa stuðul til at gera royndir av ymiskum slag m.a. til royndir við aling av nýggjum fiskasløgum.

100-18 Fyrispurningur til Edmund Joensen, løgmann, viðv. grunninum til løgu í fast samband um Vestmannasund

Á 1998. miðtalsfundi 4. marts, boðaði formaðurin frá umrøddu fyrispurningi frá Tórði J. Niclasen, løgtingsmanni, sum var soljóðandi

Nær kann roknast við, at løgtingsuppskotið um »Grunn til løgu í fast samband um Vestmannasund« verður lagt fyri tingið?

Nær ætlar løgmaður at fýsa løgina, um hon verður samtykt?

Viðmerkingar
Tá fíggjarlógin fyri 1998 varð samtykt, samtykti løgtingið samstundis, at 10,3 mió.kr. skuldu setast í grunn, ætlaður til løgu í fast samband um Vestmannasund. Løgtingið hevur somuleiðis í eykajáttanarlóg samtykt at seta útvið 10 mió.kr. í nevndi grunn. Sostatt er samlaða játtanin nú góðar 20,2 mió.kr.

Í viðmerkingunum til fíggjarløgtingslógina 1998 verður sagt: *»Greinast skal løgaruppskotet um, hvussu grunnurin kann nýtast, og hvussu hann skal skipast. Nýtsla kann ikki av hesi hvørvsheitu, tíðarinn løgin er fýst«.*

Í løgtingslóg um stýrisskipan Føroya § 1 verður m.a. sagt: »Í ymiskum málum er løgarvaldið hjá løgtinginum og løgmanni í felag ....«

Í § 26 stendur: »Løgtingslógaruppskot, ið løgtingið hevur samtykt, fær løgargildi, tá ið tað seinast 30 dagar eftir endaligu samtyktina er staðfest av løgmanni og kunngjørt samsvarandi kunngerðarreglum, ásettar í løgtingslóg.«

Hetta merkir, at um løgmaður ikki innan nevndu 30 dagar freist staðfestir samtykt løgtingslógaruppskot, feður

málið burtur - og má reisast av nýggjum.

Tí hevur tað almennan áhuga at fáa upplýst ikki bert, nær lógaruppskotið um »Grunn til fast samband um Vestmannasund« verður lagt fyri tingið, men eisini at fáa at vita, um løgmaður ætlar í nevnda máli at halda seg til ásetingina í løgtingslóg um stýrisskipan Føroya § 26.

Í fyrispurningi til løgmann, dagfestur 12. januar 1998, viðvíkjandi útbygging av Vága Floghavn spurdi undirritaði m.a.:

Hvørja støðu hevur landsstýrið til, at danska ferðslumálaráðið møguliga vil fremja eina útbygging av flogvøllinum í Vágum?

> Hevur landsstýrið fráboðað donsku stjórnini, at tað tekur undir við eini útbygging-
> arætlan av flogvøllinum í Vágum?

Í svari, dagfest 11.02.98, segði løgmaður m.a.»Flogsambandið er einasta ferðasamband við umheimin stóran part av árinum. Tað hevur alstóran týdning, at flogvallaviðurskiftini eru so góð sum gjørligt. Tað er tí at fegnast um, at ferðslumálaráðið er sinnað at betra flogvallarviðurskiftini á flogvøllinum í Vágum.« Og »Løgmaður hevur í samrøðu heitt á ferðslumálaráðharran um at fremja nevndu útbygging og bjóðað honum til Føroyar at greiða málið endaliga ...?

Eingin ivi er um, at spurningurin um undirsjóvartunnil og flogvallaspurningurn eru nær tengdir hvør at øðrum.

Tí eiga vit at gera okkum greitt, at í sambandi við eina ætlaða útbygging av flogvøllinum, er tað neyðugt og náttúrligt, at stig verður tikið til fast samband um Vestmannasund.

Við sambandi undir Vestmannasundi og við flogvøllinum liggjandi í Vágum, verða nakrar nýggjar og monandi betri fortreytir skaptar fyri útflutningi/innflutningi til Føroyar, - og fer hetta at gagna øllum føroyingum.

Her verður sjálvandi hugsað um útflutning av fiskavørum, men so sanniliga eiga vit ikki at undirmeta, hvønn týdning slík betrað farleið frá flogvøllinum inn á »meginlandið« kemur at hava í sambandi við eina komandi oljuvinnu.

Fyri vinnulívið í Vágum fer slíkt samband sjálvandi at hava alstóran týdning.

Fyri ferðavinnuna í Vágum fer slík farleið sjálvandi eisini at hava stóran týdning.

Tænastustøðið til allar Føroyar fer at hækka (her verður m.a. hugsað um neyðugar lutir, ið koma loftvegis og skulu verða skjótt frammi).

Samanumtikið kann sigast, at skal vinnulívinum í Vágum verða lív lagað, og skal Vágoyggin sum frá líður ikki avtoftast, er tað sera umráðandi, at stig sum skjótast verða tikin til, at arbeiðið upp á tunnilin kann fara í gongd.

Tí er tað, at spurningurin viðvíkjandi lógaruppskotinum um »grunnin til løgu í fast samband um Vestmannasund« verður reistur.

5. mars 1998 varð við 19-0-0 atkvøðum samtykt, at fyrispurningurin skuldi svarast

Fyrispurningurin varð ikki svaraður; fall hartur sbr. stýrisskipanarlógini § 15, stk.3. tí at løgtingsvalið var 30. apríl 1998.

100-19 Fyrispurningur til Edmund Joensen,

løgmann, viðv. fyrivarninum í handilssáttmálanum við ES

Ár 1998, hósdagin 5. mars, boðaði formaðurin frá omanfyri nevnda fyrispurningi frá Lassa Klein, løgtingsmanni, sum var søkjandi

Hevur landsstýrið nakrantíð tikið fyritarni fyri vøruta, sum verða innfluttar úr ES, soleiðis sum heimild er fyri í handilssáttmálanum?

Um so er, at hetta ikki er gjørt, hvør er orsøkin til tess?

Viðmerkingar
Sambært handilssáttmálanum við ES hevur landsstýrið møguleika at seta tiltøk í verk eitt nú á landbúnaðarøkinum, fyri at verja føroyska framleiðslu.

Landbúnaðarvinnan hevur verið úti fyri stóðugari kapping úr ES á landbúnaðarøkinum, og serliga er talan um neyta- og lambskjøt, umframt grønmeti og mjólkaúrdráttir. Eisini bakaravinnan hevur orsakað av hørðu kappingini frá ES merki sviðan av »dumping prísum.«

Landsstýrið hevur møguleikan at avmarka innflutningin av landbúnaðarvørum úr ES sambært handilssáttmálunum við henda marknað.

Soleiðis, sum gongdin er í løtuni, fer kappingin úr ES á hesum øki at geva føroyskt framleiddum vørum møguleikan.

Kappingarfortreytirnar hjá føroysku vinnuni eru ikki tær somu, sum hjá kappingarneytunum uttanlanda.

Vandi kann verða fyri, um hendan gongdin heldur fram, at føroyskt framleiddar vørur gerast munandi dýrari, samstundis sum útlendskar vørur í stórum tali verða innfluttar, og seldar fyri munandi lægri kostnað orsakað av ES stuðli, sum torført er at ávísa.

Landbúnaðarvinnan og bakaravinnan eru orsakað av miðvísum stuðli av hesum vørum úr ES av álvara høtt, og tey mongu, sum eru knýtt at hesum vinnum eru í vanda fyri at gerast arbeiðsleys, um gongdin heldur fram, uttan at neyðug stig verða tikin frá føroyskari síðu at »verja« føroyska framleiðslu á hesum øki.

Hetta er tí orsøkin til omanfyri nevndu spurningar til løgmann.

12. mars 1998 varð við 17-0-0 atkvøðum samtykt, at fyrispurningurin skuldi svarast.

Fyrispurningurin varð ikki svaraður; fall burtur sbr. stýrisskipanarlógini § 15, stk.3, tí at løgtingsval var 30. apríl 1998.

100-20 Fyrispurningur til Anfinn Kallsberg,

Landsstýrismann, viðv. støðuni hjá teimum, sum mist hava hús síni í kreppuárunum

Ár 1998, høsdagin 12. mars, boðaði formaðurin frá omanfyri nevnda fyrispurningi frá Jenis av Rana, løgtingsmanni, sum var soljóðandi

Hvørjar ætlanir hevur landsstýrið í sambandi við fíggjarligu støðuna hjá teimum, sum heilt ella lutvíst orsakað av niðurskriving av sethúsavirðunum í kreppuárunum misti hús síni og kunnu at sita eftir við skuld, uttan at ogn er aftanfyri?

Viðmerkingar

Øllum kunnugt eru nógvir føroyingar komnir illa fyri orsakað av fíggjarkreppuni her á landi. Ikki minst teir fyrrverandi sethúsaeigarar, sum við stórari sethúsaskuld saman við arbeiðsloysi, ikki hevdu møguleika at verða verandi í egnum húsum. Hesir hava sera lítlar møguleikar at fóta sær aftur og harvið gerast førir fyri aftur at seta fótur undir egið borð. Nógvir teirra sita við skuld uppá fleiri hundrað túsund krónur og gjalda eins nógv fyri hesa skuld, sum onnur gjalda fyri at sita í egnum húsum. Hetta hevur sera óhepnar avleiðingar fyri familjulívið, har fysiski karmurin ikki er í lagi, og mong kunnu sigast at vera heimleys, tá eingin veruligur leigupolitikkur finst í Føroyum.

Vanligi skattaborgarin hevur bjargað bankunum við milliardaimnskoti yvir skattapeningin. Hvørmi hava bankarnir ikki eftirgivið skuld hjá sethúsaeigarunum í tann mun, sum politiski myndugleikin hevði væntað og ætlað, og kann hetta als ikki góðtakast - og má ástaðast. Viðurskiftini hjá hesum fyrrverandi sethúsaeigarunum mugu avgjørt takast við í viðgerðini, tá gerast skal upp í bankamálinum. Eitt fólk, sum skal byggja land undir slíkum umstøðum, hevur ikki tørv neyðugu fortreytirnar, og er ikki nóg motiverað at leggja alla orku í.

Fríggjadagin 13. mars 1998 varð við 20-0-0 atkvøðum samtykt, at spurningurin skuldi svarast.

Fyrispurningurin varð ikki svaraður, fall burtur sbr. stýrisskipanarlógini § 15, stk.3, tí at løgtingsvalið var 30. apríl 1998.

101-1 FRÁGREIÐING FRÁ LØGMANNI 1997

Innihaldsyvirlit síða

Ingangur 1437
Gongdin í hesum valskeiði 1437
Úrslit 1438
Tiltøk í hesi tingsetu 1438
Framtaksgrunnurin 1439
Fiskidagaskipanin 1439
Blokkstuðulin 1439
Afturgjalding av almennu skuldini 1439
Samráðingar við ES um nýggjan sáttmála 1439
Handilssáttmálar við eystanhond 1440
Kolvetnisvirksemi 1440
Landsoljufelag 1440
Bankaskuldin 1440
Rættindi í altjóða sjógvi 1441
Fiskuvirking á landi 1441
Norðhavssild 1441
Tilfeingisdepil 1441

Nýskipan av landsumsitingini 1441
Niðurstøða 1441
Uttanlandsmál 1442
Marknasamráðingar 1442
Figgjar- og búskapurmál 1442
Skuld landskassans 1443
Skattamál 1444
Lønarmál 1444
Kommunumál 1445
Skattaintøkur 1445
Kommunuskattur 1445
Kommunubygnaður 1445
Fiskivinnumál 1446
Fiskidagaskipan 1446
Veiðiflotin 1446
Veiðimøguleikar 1446
Flakavirkisvinnan 1447
Hvalaveiðimál 1448
Sjóvinnumál 1448
Vinnumál 1448
Alivinna 1448
Ídnaður 1449
Ferðavinna 1449
Landbúnaðarmál 1450
Samskiftismál 1450
Fjarskifti 1450
Flutningssamband 1450
Kunningartøkni 1451
Orku- og umhvørvismál 1451
Orkumál 1451
Elmegi 1451
Umhvørvismál 1451
Umhvørvisvernd 1451
Samskipan 1451
Arbeiðsmarknaðarmál 1452
Almanna- og heilsumál 1452
Almannamát 1452
Rammulóg 1452
Heimarøkt 1452
Sambýli 1453
Heilsumál 1453
Sjúkrahúsráð 1453
Sjúkratrygging 1453
Undirvísingar- og mentamál 1453
Skúlamál 1453
Nýggj fólkaskúlalóg 1453
Granskingarráð 1454
Mentamál 1454
Útlitmiðlalóg 1454
Kirkjuliggáva 1454
Samantak 1455
Løgfesti 1456

Inngangur

Harra formaður.
Síður er, tá nýggj tingseta byrjar, at Føroya løgmaður gevur tinginum eina frágreiðing um gongdina og støðuna í samfelagnum, og tí, ið landsstýrið hevur í ætlan at fremja.

Av tí at løgtingsval verður áðrenn næstu ólavsøku, verður hetta seinasta løgmansrøðan í hesum valskeiði.

Aftaná løgtingsvalið tann 7. juli 1994 og eftir drúgvar samráðingar við Fólkaflokkin, sum haraftrat skriv aði undir eitt samgonguskjal, eydnaðist tað at skipa eina samgongu undir leiðslu Sambandsfloksins við Javnaðarflokkin, Verkamannafylkingina og Sjálvstýrisflokkin.

Javnaðarflokkurin var sostatt við til at leggja lunnar undir tann framburðspolitikk, sum er rikin í hesum valskeiði. Hóast tað gongur út um aft vit og skil, hvi Javnaðarflokkurin stakk í sekkin í juni mánaði í fjør, tá positivu úrslitini av tikna politikkinum longu vóru sjónsk, fari eg aftur at takka teimum fyri teirra lut, tá tíð, tað vardi. Men bæði javnaðarmenn og føroyingar sum heild sakna eina frágreiðing um hetta fyribrigdi.

Aftaná at Javnaðarflokkurin hevði tikið stuðul sín aftur, helt samgongan fram sum minnilutasamgonga við fullum heimildum.

Maður kemur í mans stað. Fólkaflokkurin, sum ikki fekst við frá byrjan, og sum hevði staðið á síðulinjuni út við tvey ár, dugdi nú at síggja fyrimunirnar av tikna politikkinum og valdi at koma upp í samgonguna fyri at stuðla heldur enn at steðga positivu gongdini. At tað var rætt at gera nýggja samgongu við sonn endanálsorðing, sum undanfarna samgonga hevði, er eingin ivi um.

Lat meg beinanvegin undirstrika, at eg eri fegin um búskaparligu vendingina í samfelagnum, sum er vorðin so týðilig í hesum valskeiði, og somuleiðis undirstrika, at við Sambandsflokkinum á odda fyri báðum samgongunum hava allir fimm samgonguflokkarnir sín lut í positivu úrslitunum.

Gongdin í hesum valskeiði
Ongin føroyingur hevur gloymt ta støðu, sum Føroyar vóru komnar í, áðrenn løgtingsvalið í 1994. Føroyar vóru sum einasta land í vesturheiminum farnar so rakdiffiga á húsagang, og harafturat settar undir útlendska umsiting so seint sum í nítáratunum og við tilsøgn frá einum politiskum meiriluta í Føroyum.

Vit mistu fralsið á flestu økjum, eisini rættin til at skipa fyri fiskivinnuni á sjógvi og landi, á tiggjar- og búskaparøkinum, og vit góðtóku harafrat bindingar uttaneftir um eina framtíðar oljuvinnu undir Føroyum.

Politiska støðan og gongdin í landinum kundi lýsast við einum orði: Kaos. Ongin leiðsla og ongi haldbar uppskot til loysnir. Ein avskeplað øsing, sum mest hevur verið vend móti døtrum, og sum ikki á nakran hátt kundi skapa framburð aftur í Føroyum.

Í dag er støðan ein heilt annur. Heimastýrið er vunnið aftur, og føroyingurin hevur fingið treystið aftur.

Avtalur, ið undanfarin landsstýri gjørdu við donsku stjórnina, vórðu nú broyttar til felagslýsingar, sum leystu okkum burtur úr tyngjandi bindingum. Vit eru tí ikki longur undir útlendskari umsiting, vit skipa sjálv fyri okkara høvuðsvinnu, og fyri búskapar- og tiggjarmálum, og vit hava vunnið okkum fullan rætt aftur til sjálv at skipa fyri eini møguligari oljuvinnu. Vit hava vunnið okkum meginpartin aftur av tí fralsinum, sum føroyingar áttu, áðrenn samfelagið fór á húsagang.

Men støðan er tó ikki nøktandi enn. Hóast vit kunna fegnast um, at nettoutanlandsskuldin er minkað munandi, er skuld landskassans framvegis alt ov stór. Endalig greiða skal fáast við danir á tí partinum av skuldini, sum stavar frá bankadjarvingini, og tí partinum, sum av rottum er okkara.
Tá hugsað verður um byrjunarstøðuna og tungu uppgávurnar at loysa, er ikki at undrast á, at talan av og á hevur verið um ávísan turbulens á ferðini. Seinastu tíðina hevur tó verið friðarligari.

Ráðharraábyrgdin hevur nú eitt ár á baki. Løgmaður hevur tvær ferðir givið landsstýrismonnum ábreiðslu, sum landsstýrismennirnir hava tikið til eftirtektar. Eitt tiltalitisuppskot varð á fyrsta stimi sett fram móti landsstýrismanni í løgtinginum. Hetta royndist tó sum leysaskot.

Henda stutta lýsing av støðuni frá byrjan av valskeiðnum og til broyttu støðuna í dag, er samstundis ein lýsing av gongdini higartil í samfelagnum, og hvussu neydugt tað er, at henda gongdin heldur fram.

Tað hevur afstóran týdning at halda fast um settu kósina, serliga nú valárið merkast. Eg ætli mær í sam gonguni - og andstøðuni við - at gera alt, sum eg kann og um neydugt forða fyri ov nógvum turbulensi, nú tað stundar móti løgtingsvali. Tað, sum tekur langa tíð at byggja upp, er skjótt at bróta niður. Tað, sum hesir fimm flokkar hava bygt upp í tey ár, eigur ikki at verða lorað útaftur á fjórða ári. Tað hevur stóran týdning at halda fast um náddu politisku og búskaparligu framstigini, enn at toyggja valskeiðið út til juli mánað.

Hesir fimm flokkarnir, sum hava verið í hesum samgongum, kunnu óræddir leggja nádfedu úrslitini fyri veljaran. Tað, sum veljarin skal taka støðu til, er ikki, um tað hevur gingist væl í hesum valskeiðnum - tí tað er eydsæð, tað hevur tað - men veljarin skal taka støðu til, hvørjir flokkar hava styrki til at halda fast um tey náddu framstigini og tryggja harðvunna framburðin í Føroyum. Styrkin stendur í støðufestinum og ikki í løttum lyftum.

Úrslit

Í stuttum fari eg at grundgeva tað, sum longu er nevnt í røðuni, áðrenn tey ymsu málsøkini verða útgreinað.

Fyrst nøkur ítøkilig dømi um úrslit tey fáum árini, síðani nøkur mál, sum ætlanin er at náa í hesi tingseto.

- Ta umsitingarvald, sum danir høvdu fingið í áður gjordum avtalum, fyrst og fremst viðvíkjandi okkara høvuðsvinnu og eini framtíðar føroyskari oljuvinnu, rættaðu vit uppaftur í felagslýsingini.
- Løgtingsfíggjarlógin bevar víst avlop tey ár á rað. Føroyar kunnu nú greiða allar sínar skyldur. Felagslýsingin við donsku stjórnina um javnvág á fíggjarlógini í 1998 er sostatt væl og virðiliga hildin.
- Gjaldsjavnaavlopið var eitt góð milliard í fjor. Seinasta tølini vísa, at talan verður um eina 1/2 mia.kr. í ár, aftaná at byrgt er upp fyri ICES-tilmælunum.
- Handilsjavnaavlopið var út við 300 mió.kr. í fjor. Sjálvt við tí stóra virksemiinum verður roknað við avlopi aftur í ár, einar 250 mió.kr.
- Nettoutlanlandsskuldin er nógv minkað, úr 4,3 mia.kr. í 1995 niður í góðar 3 mia. kr. í 1996.
- Fólkatalið veksur av álvara aftur. Veksturin í ár verður meir enn 500 fólk. Í áttatiárunum var miðalveksturin 450 fólk árliga.
- Arbeiðsloysið minkar. Í 1993 var tað eini 20-25%, í fjor 11,6%, og seinastu upplýsingarnar siga 9% í ár.
- Skattatrystið er minkað uppaftur meira í ár. Harafturat er grundlonin hjá pensjónistum nú skattafrí.
- Skattuhámarkið er lækkað niður aftur á 50%, og marginalskattatrystið er lækkað.
- Fíggjarognaravgjaldið, sum upprunaliga kostaði borgarunum umleið 130 miljónir kr. árliga, er endaliga avtikið.
- Uttanlandsmál fáa nú størri leiklut í føroyskum politikki. Arbeiðið er raðfest, og samstarvið millum landsstýrið og uttanríkismálaráðið er skipað við føroysk/danskari embætismannanevnd.
- Passtrupufleikar hjá m.a. føroyskum sjómonnum, handverkarum og fesamdi, sum virka í ES-londum eru loystir umsitingarliga. ES-pass verða nú útflyggjað í Føroyum og í Danmark eins og føroysk pass verða útflýggjað í Danmark.

Tiltøk í hesi tingsetu

Vit hava alla orsøk at fegnast um hesi risaframstig, sum tala fyri seg; men enn eru nógv týdningarmikil mál at viðgera. Nevnast kunnu m.o.:

Framtaksgrunnurin

Í viðtøkunum fyri Framtaksgrunnin stendur, at tað verða endurskoðaðar 3 ár eftir, at grunnurin varð settur

á stova. Løgdeildin er farin í holt við at gera uppskot til endurskoðaðar viðtøkur fyri grunnin.

Fiskidagaskipanin
Síðan vit aftur fingu loyvi til sjálvir at skipa okkara fiskivinnu á sjógvi og landi, hevur verið nógv strið og lítil semja um, hvat ið gerast skuldi.

Høvuðsspurningurin hevur verið, sum damir eisini fordu fram, um vit eru førir fyri at skipa soleiðis fyri, at vit uppá longri sikt fáa sum mest burturút okkara tilfeingi.

Vit hava í einar 14-15 mánaðir roynt eina fiskidagaskipan. Fyri fáum døgum síðani fingu vit aftur váttan um, at tað er torført hjá vinnuni, fiskifrøðingum og øðrum at semjast um felags loysnir.

Tað er sjálvsagt politiski myndugleikin, sum skal skera igjøgnum. Tað er tað, hann er valdur til. Hetta hevur áður vist seg at vera torført, og tað sær einki metari út nú.

Hagtøl vísa, at meir enn 30% av teimum fiskidøgum, sum vórðu tilluttuðir fyri seinasta fiskiár, ikki eru nýttir. Ymiskt er hjá skipabólkunum, frá knøppum 20% til meir enn 70%.

Í fjølmiðlunum hoyrir og sært tú polittikkarar í fullum álvara kjakast um eina minking uppá 12.5% til 15%. Tíverri sær tað út sum um flokkar eru samdir um hetta, og at hetta er galdandi fyri ein stóran meiriluta í løgtinginum. Veruleikin er, at ein avmarking undir 30% í miðal er ongin minking at tala um.

Hví ikki leggja kortini á borðið og siga sum er, at Føroya løgting gongur ikki við til avmarkingar í veiðini eftir tí tilfeingi, sum vit og okkara eftirkomarar skulu liva av. Tað hevði verið reiðiligari fyri veljaran og serliga fyri teir útlendingar, sum fíggja føroyska virksemið, og sum skulu meta um okkara kredittvirði, tá okkum tørvar meiri fígging. Tí tað verður endin við hetta lag.

Blokkstuðulin
Í felagsfýsingini frá 3. november 1995 avtalaðu ríkisstjórnin og landsstýrið at ásetta støddina á blokkstuðulinum til og við 1998. Eisini varð avtalað, at ein arbeiðsbólkur áðrenn 1997 er lokið skal gera uppskot til, hvussu blokkstuðulin verður ásettur framyvir. Hesar samráðingar skulu avgreiðast í ár.

Løgfrøðiliga grundarlagið undir blokkstuðulinum er heimastýrislógin. Blokkstuðul er samsyning fyri, at vit umsita og hava ábyrgd av málsøkjum fyrí danir. Talan er í høvuðsheitinum um tey tungu økini sum heilsuverkið, almannaverkið og skúlaverkið.

Blokkstuðulin er næstan ein triðingur av fíggjarlógini. Tað er greitt, at sjálvt ein lítil niðurskurður í blokkstuðulinum hevði havt álvarsligar búskaparligar fylgir við sær. Ein donsk/føroysk embætismannanevnd arbeiðir við málinum og roknað verður við, at nevndin verður liðug í heyst. Politiskar samráðingar millum ríkisstjórnina og landsstýrið verða í vetur.

Afturgjalding av almennu skuldini
Sambært felagslýsingini frá 1995 verður spurningurin um afturgjalding av uttanlandsskuldini tikin uppaftur í ár. Hóast ríkisstjórnin hevur sagt seg vera sinnaða at leingja tíðarskeiðið, tá lánini skulu verða afturgoldin, verður farið undir samráðingar við ríkisstjórnina um tíðarskeið og treytir sum skjótast. Tilmæli verður nú gjørt, sum verður grundarlag undir politiskari viðgerð í landsstýrinum.

Samráðingar við ES um trygdan sáttmála
Politisk undirtøka er nú fyri at samráðast við ES um trygdan sáttmála. Víst verður til uttanlandsfrágreiðingina, har viðurskifti Føroya við ES og aetlanir á hesum øki eru nærri lýst.
Handilssáttmálar við eystanlond
Samráðingar um handilssáttmálar við 10 eystanlond byrja í fyrru helvt av september mánaði. Ætlanin er at

fara undir samráðingar við Estland sum fyrsta landið, og næst í rødini verður Pólland.

Kolvetnisvirksemi
Stutt undan ólavsoku varð frágreiðing hjá oljuráðleggingarnevndini: »Fyrireikingar til oljuleiting« handað løgmanni. Løgtingsmenn hava fingið frágreiðingina til kunningar, og málið verður viðgjort í løgtinginum í heyst.

Deutur verður lagdur á, at oljupolitikkur byggir á holla vitan og í gjølligar fyrireikingar. Henda frágreiðing er sera umfatandi við fullfíggjaðum uppkasti til uppskot til løgtingslóg um kolvetnisvirksemi við viðmerkingum. Harumframt er gjøllað greitt frá ymsum spurningum, sum hava týdning fyri oljuvirksemi í Føroyum, og tilmæli eru gjørd um mál hjá landsmyndugleikum at taka stoðu til. Frágreiðingin fevnir um meginpartin av tí, ið er neyðugt til tess at fyrireika ein føroyskan oljuleitingarpolitikk sum heild.

Fimm at gera eru serligu treytirnar fyri fyrsta útbjóðingarumfarið til oljufelag um oljuleitingarloyvi og uppkast til løgtingslóg um inntøkuskatting av kolvetnisvirksemi. Hesum tilfari verður brúk fyri, tá støða verður tikin til, hvørji havbotnsøki útbjóðingarumfarið skal fevna um, og nær umfarið skal verða.

Landsoljufelag
Landsstýrið fer nú at seta nevnd at gera tilmæli um, hvussu eitt landsoljufelag verður skipað við atliti til ognarviðurskifti, stýring, handilsliga og samfelagsliga og leikluti tess í samband við tá politisku og umsitingarligu skipanina og vinnulívið.

Støða verður í næstum tikin til, nær og í hvørjum líki uppkastið til løgtingslóg um kolvetnisvirksemi verður lagt fyri tingið

Bankaskuldin
Løgtingið samtykti einmælt at áleggja landsstýrinum at biðja ríkisstjórnina gera eina dómarakanning av partabrævaumbýtinum av Sjóvinnubankanum og Føroya Banka.

Úrslitið var, at vit fingu eina bankakanningarnevnd, sum í høvuðsheitum skal kanna umstøðurnar viðvíkjandi partabrævaumbýtinum millum Den Danske Bank og Fíggingargrunnin frá 1992. Úrslitið av kanningini verður grundarlag undir eini meting av, um rættarlig ábyrgd kann gerast fyri myndugleikar, virki og persónar, ið høvdu sát lut í málinum.

Tann parturin av skuldini, sum stavar frá bankabjargingini, verður tikin upp, tá bankakanningin er liðug. Formaðurin í kanningarnevndini hevur boðað frá, at kanningarúrslitið verður greitt seinni í heyst. Tað fori við sær, at uppgerðin av bankaskuldini, sum ikki kann gerast fyri enn bankakanningin er liðug, dregur út.

Sjálvur haldi eg ikki, at ein bankakanning var neyðug, um avtalan við hesi skuldi verða at áleggja ábyrgd, tí ábyrgdin er greið frammanundan. Bankamál eru og hava altíð verið felagsmál. Tað eru sostatt ríkismyndugleikarnir, ið hava allar heimildir og alla ábyrgd av hesum øki. Hetta er í sjálvum sær nóg góð grundgeving fyri, at danir mugu átaka sær tann partin av uttanfandsskuldini, sum skyldast bankabjargingunum.

Hetta sløðu danir eisini fast við sjeytummaseymi, tá Føroya landsstýri í sumri 1992 legði upp til at yvirtaka málsøkið við atliti til at gera Føroyar til eitt serligt skatta- og búskaparøki. Hetta er staðfest í brævi frá ríkismyndugleikunum.

Fyri at fáa danir at góðtaka hetta nú aftaná á tað, sum er farið fram, er neyðugt, at føroyskir politikarar eru samdir um hetta sjónarmið. Hetta átti ikki at verið so trupult. Eitt einmælt løgting hevur longu tikið fyri vanvi fyri rentunum, sum stava frá bankabjargingunum.
Rættindi í altjóða sjógvi
Í løgmansrøðuni í fjør varð nimt á teir møguleikar, sum liggja í okkara tillutan av umleið 2.500 fiskidøgum

við Svalbard og eini kvotu uppá 1,500 tons av rækjum í russiskum sjógvi. Hetta eru møguleikar fyri 100 milliónir virði, sum vóru nærum ótroyttir, hóast vit hava ein ov stóran veiðiflota.

Eg fari at endurtaka frá í fjør, at tað hevur stóran týdning at vera við, har møguleiki býðst, eisini fyri at tryggja sær rættindi til framtíðar kvotur, og fyri at útvega føroyingum arbeiðspláss.

Fiskavirking á landi
Í løgmansrøðuni í fjør vísti eg á, at alt ov nógvur fiskur fer óvirkaður av landinum. Skotið varð upp, at vit setru í gildi eina skipan sum ta íslendsku. Tað er ongin ivi um, at tørvandi loysnir á hesum øki hava kostað og kosta framvegis føroyingum nógv arbeiðspláss. Nú sær út til, at skjøtil verður settur á, tá fiskiárið byrjar.

Norðhavssild
Øktu møguleikarnir fyri at fáa stórar nøgdir av norðhavssild uppá land í Føroyum hava givið grundarlag fyri at byggja upp ein stóran sildaídnað her á landi við møguleika fyri nógvum arbeiðsplássum og stórari virðisøking til samfelagið. Her er eisini hent ov lítið, umráðandi er at fáa gongd á.

Tilfeingisdepil
Stórir møguleikar eru í at gagnnýta strategisku støðu Føroya í Atlantshavi og gera Føroyar til ein tilfeingisdepil. Málið er at styrkja virkuna í altjóða kappingini og at fáa okkara lut í tí virksemi, sum natúrliga er um okkara leiðir, eitt nú útgerð, umvælingar, framleiðslu, flutning o.s.fr., tað verði seg innan fiskivinnu, oljuvinnu ella aðrar vinnur. Størri orka má verða løgd í hetta arbeiðið.

Nýskipan av landsumsitingini
Nýggja stýrisskipanarlógin tekur fyrivarni fyri tillaging og umskipan av landsumsitingini í samband við niðharraábyrgdina, við tað at ein skáli varð lagdur í lógina. Hesin skáli varð nýttur til at fyrireika nýskipanina av umsitingini, sum síðani er farin í gongd.

Arbeiðið við bygnaðarbroytingunum, sum sostatt er ein neyðug fylgja av stýrisskipanarlógini, heldur fram. Seinasti aðalstjórin, sum skal stjórna fíggjarmálastýrinum, verður settur fyrsta dagin. So er eftir at evna aðalstýrini endaliga til.

Ein týdningarmikil partur av nýskipanini er, at ein felags starvsfólkapolitikkur verður skipaður fyri at tryggja, at starvsfólkið trívist og mennist, so at almenna fyrisitingin fer at styrkjast í dygd og virkni.

Bygnaðarbroytingarnar skulu vera ein ílaga í framtíðina, so at almenna fyrisitingin kann gerast meira skikkað og rationel. Í longdini verður hetta ein sparing.

Niðurstøða
Sjálvandi kundu nógv onnur mál verið nevnd, bæði mál, sum hava eydnast og onnur mál, sum ikki hava eydnast til fulnar.

Í fjør helt onkur fyri, at løgmansrøðan 1996 var alt ov bjartskygd. Sum tað týdiliga sæst, hava úrslitini síðan vist, at so var ikki. Tað hevur eydnast okkum at vent búskaparligu gongdini nærum 180 stig. Ongin ivi um tað.

Búskaparráðið staðfestir eisini, at hagtøl fyri fyrra hálvár 1997 vísa, at framgongdin er støðug, hóast ikki eins stór og víðfevnandi og í 1996.

Fyri meg er spurningurin ikki, um tað hevur eydnast higartil; men um vit eru før fyri at halda fast við ein fíggjar- og búskaparpolitikk, sum er neyðugur fyri at varðveita tey framstig, sum eru nádd, og fyri at tryggja støðug framstig. Hetta vendi eg aftur til seinni.

Uttanlandsmál
Í vár legði løgmaður á øðrum sinni frágreiðing um uttanlandsmál fyri løgtingið. Frágreiðingin var til aðal-

orðaskiftis, beint áðrenn tingið fór í summarfrí.

Víst verður tí til uttanlandsfrágreiðingina, har uttanlandsmál farna árið longu eru lýst. Somuleiðis verður víst til frágreiðing um norðurlandamál, har tey viðurskiftini eru nærri lýst. Her skal tí bert verða trivið aftur í tey mál, har nýtt er komið fram.

Marknaðarsamráðingar
Í samráðingunum við bretar um landgrunnsmarkið hevur enn ikki eydnast at fáa semju í lag millum Føroya og Bretlands. Ikki er nógv hent í málinum síðani ólavsøku í fjør. Eftir samráðingarfundin í London í mai 1996 gingu ikki færri enn 14 mánaðir, fyrrenn tað lá fyri hjá bretum at møta á nýggjum fundi. Ein av grundgevingunum fyri drálinum var bretska parlamentsvalið í mai í ár.

Á fundinum í Keypmannahavn um miðjan juli tosaðu partarnir av nýggjum um semingsloysnir. Bretar siga seg vera hugaðar at samráðast skjótt nú til tess at fáa greiðu á, um til her at fáa eina semingsloysn yvirhøvur, ella um farast má til triðjapart at fáa ein úrskurð.

Tíðin má nú vera búgvin til at fáa endaliga greiðu á, um tað er møguligt at fáa bretar at góðtaka eina semingsloysn, sum vit føroyingar kunnu meta sum rættvísa og rimiliga. Næsti samráðingarfundur verður í september.

Síðani fari eg at tríva í tey einstøku málsøkini hjá landsstýrismonnunum.

Fíggjar- og búskaparmál

Viðvíkjandi taltilfari verður víst til fylgiskjølini til løgmansrøðuna. Her verður givið eitt stutt yvirlit yvir nøkur høvuðshagtøl hetta fyrra hálvárið:

- Fólk flyta nú aftur til Føroya. Fyrra hálvárið í ár var tilflytingin uppaftur størri enn fráflytingin sama tíðarskeið í fjør. Nettotilflytingin higartil í ár var 180 fólk mótvegis 110 í fjør. Fyri alt árið væntast ein nettotilflyting uppá umr. 300 fólk. Hetta eru rættiliga stór bruttotøl, eini 1.700-2.000 fólk árliga hvønn vegin. Umframt nettotilflytingina væntast eitt burðaravlop uppá umr. 230. Undir hesum fortreytum verða stívliga 500 fólk fleiri í ár. Miðalvøksturin øll áttatiárini var 460 árliga.
- Arbeiðsloysið er minkað úr 2240 niður í 1880 fólk, t.e. 16 % hetta seinasta árið. Tað er nú umr. 9% av arbeiðsmegini mótt umr. 11% um somu tíð í fjør.
- Lønargjaldingar eru 7% størri enn somu tíð í fjør. Hetta er eitt vet minni enn vøksturin í 1996. Munur er tó á, hvussu nógv vinnubólkarnir vaksa í mun til í fjør. Í 1996 øktist vinnugreinahólkurin vøruframleiðsla, herundir fiskiskapur, 13%. Hann er nú økturr 3%. Vert er at leggja til merkis, at lønarútgjaldingarnar í fiskavøruframleiðsluni eru minkaðar 12%. Bygging, handil o.a. tænastur eru økt 8%, tað sama sum í 1996. Í hesum bólki er serstakliga privat bygging økt nógv, 44 % móti 20% alt árið í fjør. Almennar tænastur eru økturar 7% móti 6% í fjør.
- Útflutningur, skip ikki frøknað, fyra teir fyrstu mánaðirnar er 2% hægri í virði enn sama tíðarskeið í 1996. Tó er virkaður fiskur minkaður bæði í virði og nøgd, meðan óvirkaður fiskur er økturr munandi. Útflutningurin av heilum toski og hýsu fyrstu fyra mánaðarnar er økturr úr umr. 5.000 tonsum upp í knøpp 9.000 tons. Lønarútgjaldingarnar benda á, at virksemið í fiskavøruframleiðsluni veksur. Útflutningsprísirnir eru heldur frægari í ár. Vøksturin í nøgd er væl størri, góð 20%, m.a. av fiskaframleiðslu. Beinleiðis landingarnar av toski og hýsu eru góð 13.000 tons mótt góðum 6.000 tonsum í fjør.
- Innflutningur, skip ikki frøknað, fyra teir fyrstu mánaðarnar vaks umr. 4%. Vørubólkar í vøkstri eru alifóður 30%, byggitilfar 6%, brennievni 8%, bilar 7%, nýtsluvørur 9% og fiskaframleiðsla 100%. Men færri landbúnaðarvørur -9%, vørur til "aðra framleiðslu" -16, salt -35%, feskur fiskur -92% og frystur heilur fiskur -79%. At innflutningurin av feskum og heilum fiski er minkaður so nógv teir fyrstu fyra mánaðirnar skyldast helst støðuna hjá m.a. Fiskavirking.
- Landingar til føroysk flakavirki jan-juni 1997 vóru knappliga 46.000 tons móti stívliga 44.000 tonsum jan-juni 1996, ella 4% meir. Stórur munur er á samanseting av fiskasløgum. Landingar av toski øktust

5.200 tons og hysu 2.600 tons. Hinvegin minkaðu landingarnar av upsa 3.100 tons, kongafiski 600 tons, blálongu 300 tons, havtasku 150 tons, svartkalva 390 tons og gulllaksi 1.650 tons.

- Galdsjavnaavlopið er fyribils gjørt upp til góða 1 mia.kr. í 1996
- Nettoútlandsskuldin, sum við árslok 1995 var 4,3 mia. kr., var við árslok 1996 komin niður á góðar 3 mia. kr..

Viðvíkjandi tilmælinum hjá ICES hevur búskaparráðið gjørt sær nakrar metingar:

»Fyri landskassan kann ætlast, at ein niðurskurður í samsvari við ICES-tilmæligina kostar landskassanum netto upp til 25 mió. kr. Fyri kommunurnar undir einum kostar tað netto 10-20 mió. kr. Arbeiðsloysisskipanin kann tó lættast at verða hart rakt, um bæði flotin verður minkaður og minni kemur til virkingar á landi. Um so verður, kann arbeiðsloysið lættast at økjast 3-5%. Hetta kann merkja, at skipanin í tíngasta føri kann fáa eina eykaútreiðslu árliga upp á upp til 80 mió. kr. Um ein ikki minkar um flotan, samstundis við at fiskiskaparin verður skerdur, so kann lættast, at útreiðslurnar hjá arbeiðsloysisskipanini ikki økjast so nógv, men at landskassin í staðin fyri fær økt útreiðslur til miðstuløn og dagstuðning.«

Vit hava orsøk til at vera kritisk mótvegis fiskifrøðiligum metingum; men tá fiskiveiðin er so langt omanfyri tað vanliga, sum hon var seinasta ár, er vandi á ferð. Ein og hvør at sær komin stjórn eigur at taka avleiðingarnar beinanveg heldur enn at bíða og so neyðast at taka skredlið seinni.

Skuld landskassans

Bruttoskuld landskassans var 6.346 mió kr. við árslok 1996. Eggjarogn landskassans í landsbankanum og aðrastaðni var 908 mió kr., soleiðis at nettoskuldin var 5.438 mió kr. Nettoskuldin vaks fram til 1995, tá hon var 5.585 mió kr. Í 1996 minkaði hon 147 mió kr. Landskassans úrslit eru munandi batnað hesi seinastu árini, tí síðani 1995 hevur yvirskot verið á eggjarlógini.

Eftir avtalunum við donsku stjórnina fær landskassin statslán til at eggja afturgjalding av lánum uttan fyri Føroyar, meðan endurlegging í Føroyum og hall skulu útvegast við lántøku á føroyska og danska kapitalmarknaðinum, tvs. við lánsbrøvum.

Við árslok eru øll uttanlandslán, sum landskassin hevði frá útlendskum bankum, umløgd til lán frá danska statinum, sum tá vóru 5.600 mió kr.

Landsstýrið hevur útgivið tvinnar lánshævarvøðir yvir 2 ár. Tann fyrra uppá 310 mió kr., sum í navnvirði gekk frá 1994 til 1996, er afturgoldin. Tann seinna uppá 300 mió. kr. í navnvirði gongur frá 1995 til 1997. Harumframt gongur ein lánsbrævarvøð við statsveðhaldi til apríl 1998.

Landskassaballið er minkað so mikið nógv, at ikki var neyðugt at selja lánsbrøv í fjør. Tá vóru lánsbrøvini afturgoldin av gjaldføru eggjarognini, tvs. av kistubotninum. Fyri at umeggja lánsbrøvini, sum ganga út í desember 1997 og apríl 1998, verða lánsbrøv fyri umleið 600 mió kr. útgivin.

Meirrentan fyri landskassans lánsbrøv sammett við statslán var 2,25% p.a. í 1994. Hon er síðan minkað til minni enn 1% p.a. fyri ett 2 ára lánsbrævalán. Hendan gongdin boðar frá einum betri kreditthvørvi.

Broytingin í seinastu samráðingunum millum landsstýrið og donsku stjórnina var, at avtalurnar broyttust til felagslýsingar. Tað førdi nógv minni politiskar bindingar við sær, og hevur skapt lætta í viðskiftunum Føroya og Danmarkar millum. Hesin lætti og bætta búskapargongdin hava styrkt munandi um kreditthvørvi Føroya uttanlands, og tá serstakliga í Danmark.

Nettorentuútreiðslurnar eru settar til 397 mió. kr. á eggjarlógini í ár, sum svarar til 14% av inntøkunum. Nettorenturnar verða kanska nakað lægri enn hetta, nú rentustigið er lækkað.

So hvørt altjúta bankalán eru fallin til gjaldingar, eru statslán tikin, og rentan ásett so hvørt. Høvdu øll statslánini verið tikin í ár, hevði árligi rentukostnaðurin hjá landskassanum verið stívliga 50 mió. kr. minni enn í dag. Hetta vísir, hvussu viðbrekin, landskassin er fyri rentubroytingum við tí stóru skuldini.

Fyri búsarbaldini og teir almennu kassarnar er vert at vísa á, at ein stórur partur av rentulættanum, sum tey hava kent, stavar frá tí óvanliga lágu rentuni, sum er í løtuni. Fer rentan upp, fer tað at kennast meint. Fyri allar partar av samfelagnum er tí sera umráðandi at konsolidera seg.

Skattamál
Bruttoskattalíknandi skipan varð sett í gildi á nýggjárinum. Uppskot um at serskatta hjún kom ikki aftur úr fíggjarnevndini og fall tí burtur. Tað verður lagt framaftur í heyst.

Tá verða uppskot um automatisering av sjálvuppgávu og ognaruppgerð, uppskot um álíkningarmyndugleika og kærumevnd, rættartrygd borgaranna og aðrar broytingar í skattalógini løgd fyri tingið. Endamálið er at fáa eina einfalda, rættvísa og liðiligа skattaskipan.

Arbeitt verður við serligari skattaskipan fyri fiski- og sjómenn, soleiðis at teir ikki av skattaávum flyta í onnur lond, har skattatrystið er munandi lægri.

Skattaletti uppá 55 mió.kr. varð givin á nýggjárinum. Skattahámarkið varð lækkað úr 52% niður í 50% og marginalskattatrystið lækkaði úr 67% niður í 60%.

Tilboð um skattaletta aftur fyri lønarafturhald verður lagt fyri arbeiðsmarknaðin, bæði tann almenna og privata. Hetta verður sjálvandi bert gjørt, um allir partar sjálvboðnir taka undir við tí.

Uppskot um broytingar í lógini um meirvirðisgjald, serliga um meirvirðisgjald á tænastuvinnuni, verður lagt fyri tingið í heyst. Barnafrádráttarin verður hækkaður.

Á nýggjárinum varð nýggj fíggjarstýringarskipan sett í gildi. Alt roknskaparhaldið og øll fíggjarstýringarskipanin vórðu gjørd av nýggjum. Nógvir trupulleikar hava staðist av umleggingini, men nú røkist fyri, at flestu trupulleikarnir eru niðdaðir av vegnum. Tó verður roknað við, at meginparturin av árinum gongur, áðrenn skipanin virkar eftir ætlan. Tá hava vit eisini ett fíggjarligt stýringarumboð, sum er neyðugt fyri at lúka ásetingarnar í nýggju stýrisskipanarlógini um avgerð og ábyrgd.

Lønarmál
Lønar- og starvsfólkadeildin á Løgmansskrivstovuni hevur í mong ár umsitið landsins lønar- og starvsfólkamál. Henda deild varð býtt sundur í tvinnar deildir, eina lønardeild og eina starvsfólkadeild. Tá lønarmál og sáttmálasamráðingar í februar mánaði vórðu flutt frá løgmanni til landsstýrismannin í fíggjarmálum.

Sáttmálarnir við flestu almennu fakfeløgini vórðu uppsagdir í mars mánaði. Felagssemja varð gjørd við 18 fakfeløg, har ásett er, at lønarafturberingin verður:

1. januar 1998	0,75%
1. juli 1998	1,25%
1. januar 1999	2,25%
Tilsamans	4,25%

Sostatt verður lønin 1. januar 1999 tann sama sum undan náttúruróðrinum í 1993.

Seinastu tvey árini hevur ein ávís lønarhækkan verið: men lutfalsliga hækkaði loka lønin meir. Í 1996 var tað serliga tí, at landsskatturin lækkaði, og í ár bæði tí at landsskatturin fækkaði og tí, at barnafrádráttarin í

kommunuskattinum hækkaði.

Seinnstu skattalættarnir hava givið løntakaranum munandi meiri pening um hendi. Verður hugt nærri at tøku ársløninni, hevur ein skattalætti somu ávirkan, sum ein lønarhækking.

Nú ið tøka lønin er munandi økt hæði í 1996 og 1997, eiga komandi hatar at verða nýttir til eftirlønar- og útbúgvingarskipanir.

Roknað verður við, at tey, ið fáa fólkapensjón, gerast fleiri, og samsvarandi fækka tey, ið skulu gjalda fólkapensjónina. Fyri at tryggja sær ein peningaligan tryggan alduridóm, er ein góð eftirlønarskipan neyðug.

Summi almenn fakfeløg hava eina skipan, har arbeiðsgevarin rindar 10% av lønini og arbeiðstakarin 5% í eftirlønargrunn. Onnur hava tilsvarandi skipan, har býtið ístaðin er 8% og 4%. Landsstýrið miðar ímóti, at øll almenn fakfeløg hava eina skipan, har býtið er í minsta lagi 4% í part til arbeiðstakara og arbeiðsgevara.

Í frágreiðingini frá búskaparráðnum varð nevnt, at 900 almenn størv vóru fleiri í almenna sektorinum síðani 1994. Kanningar vísa nú, at hesi tøl eru heilt burturvið. Ein villa vísti seg beinanveg, at umleið 500 fólk vóru skrásett ov nógv í hagtalsskipanini. Aðrar villur eru eisini ávístar. Vónandi fer tann umskipanin av hagtalsarbeiðnum, sum verður gjørd í samstarvi við Danmarks Statistik at bøta um hetta, so at slík tøl verða meira eftirfarandi framyvir.

Kommunumál

Skattainntøkur

Skattainntøkurnar hjá kommununum eru hækkaðar. Í 1992 vóru tær 562 mió. kr., og í 1996 uml. 670 mió. kr. Í fíggjarætlanini 1997 verður roknað við, at skattainntøkurnar verða uml. 655 mió. kr.

Gongdin higartil í ár í kommunuskattinum bendir á, at inntøkurnar verða hægri enn roknað er við á fíggjarætlanini. Fyribils skattainntøkurnar hava fyrra hálvárið verið uml. 365 mió ella 61 mió. kr. í meðal um mánaðin. Meðal kommunuskattaprosentið er tað sama í ár sum í fjør: 19,85. Rakstrar- og fløguútreiðslurnar eru hækkaðar úr 411 mió. kr. í 1996 upp í 444 mió. kr., sum avsettar eru á fíggjarætlanini í ár.

Kommunuskattur

Skuldin bindur framvegis kommunurnar. Í 1997 fara uml. 1/3 av inntøkunum at rinda rentur og avdráttir. Politikkurin er, at kommunurnar skjótast gjørligt eiga at fáa størri fíggjarliga rúmd til sjálvar at taka avgerðir.

Kommunurnar eiga ikki at taka upp nýggj lán og eiga ikki at nýta allan inntøkuvøksturin at økja um rakstrar- og fløguútreiðslurnar nú, men at nýta vøksturin í inntøkunum at rinda skuldina alt tað soleiðis, at tað í longdini fáa størri frælsi til sjálvar at raðfesta inntøkurnar. Hesin politikkur fer at halda fram í 1998.

Kommunubygnaður

Arbeiðið hjá nevndini at gera nýggjan kommunubygnað gongur sum ætlað, og er fyrsti partur av arbeiðinum, útgreining av verandi kommunuskipan, um at verða liðugur. Hetta verður stutt eftir álavsøku sent kommununum og øðrum áhugaðum til ummælis. Roknað verður við, at endaliga álitið við uppskoti um nýtt ábyrgdar- og uppgávubýti og um nýtt kommunuuppbýti verður liðugt í vár.

Uppskot til nýggja lóg um hýarplanir og byggisamtyktir verður lagt fyri løgtingið í hesi tingsetuni. Nevnd er sett at gera uppskot til eina landsbyggireglugerð.

Fiskivinnumál

Fiskidagaskipan

Lógin um vinnuligan fiskiskap er í ár broytt soleiðis, at fortreytir nú eru fyri at skipa fiskiflotan, og at virkingar- og søluliðið fær betri umstøður at virka undir. Ætlanin er framvegis, at við tokniligari skipan skulu búskaparligu málini í fiskivinnuni verða rokkin. Víst varð á, at fiskidagaskipanin í verki hevði betri møguleikar at virka enn kvotaskipanin.

Ein meinbogi við lógini hevur verið, at fiskiættindini ikki eru umsetilig í meira enn 5 ár. Hetta verður nú broytt, og í uppskotinum til broytingar í lógini um vinnuligan fiskiskap verður niðað fyri, at kvotur og fiskidagar í undirbólkunum verða frítt umsetilig í 15 ár, at fiskidagartir fyri komandi fiskiár verða 12_% færri, at skipanin við innan- og ytru fiskidagaleiðini verður óbroytt, og at økisfriðingarnar í lógini verða óbroyttar. Tó verða tiltøk sett í verk til tess at friða gytingarleiðirnar hjá toski, hysu og upsa. Veiðin eftir svartkalva verður minkað umleið 20% og veiðin eftir kongalíski verður minkað sera nógv. Veiðin á Føroya Banka verður á sama støði næsta fiskiár.

Hesi reguleringartiltøk eru ætlað at tryggja, at fiskastovnarnir undir Føroyum verða gagnnýtir burðardygt, og at skipanin við fiskidøgum og stongdum økjum tryggjar, at endamálini í lógini um vinnuligan fiskiskap verða rokkin.

Veiðiflotin
Landsstýrið fer at leggja uppskot fyri løgtingið um nýggja fóggávu at endurnýggja veiðiflotan, soleiðis at hann verður betri samansettur til tess at stimbra fiskivinnuna sum heild, so hon gevur størri ágrot til samfelagið.

Almenni stuðulin til fiskivinnuna má leggjast um, so at allir tættir, sum stuðla ovurorku, verða tiknir burtur og bert teir, sum eru verulig inntøkutrygd og sum stuðla menning og nýskapan, verða varðveittir. Tí verður lógarverkið viðvíkjandi rakstrar- og lønarstuðli til fiskivinnuna, herundir inntøkutrygdarlógirnar, eftirkannað.

Samanumtikið verður mett, at veiðitrýstið á landleiðini er ov stórt, og vil gagnnýta ikki veiðimøguleikarnar á fjarleiðunum í nóg stóran mun. Tó eigur at verða havt í huga, at nógvir av teimum veiðimøguleikum og teimum kvotum, sum føroysk skip kunnu veiða uttan fyri 200 fjórðinga fiskimarkið verður umbýtt við tilfeingið á landleiðunum í teimum fiskiveiðiavtalum, sum Føroyar hava. Avtalurnar við onnur lond ávirka eisini føroysku fiskimøguleikarnar í føroyskum øki.

Veiðimøguleikar
Viðvíkjandi fiskivinnusamráðingum verður víst til frágreiðingina um uttanlandsmál, har fiskivinnusamráðingar farna árið eru gjølla lýstar. Her verður bert nomið við tey mál, ið eru til viðgerðar.

Hóast stirlnið hevur gingist at fáa avtalu við Baltisku londini, so eru fiskivinnusáttmálarnir á einum góðum búskaparligum støði. Føroyar fingu at enda eina betri avtalu við Noreg, har avtalan við Russland er tann týdningarmesta.

Møguleikar eru nú serstakliga fyri øktum veiðimøguleikum eftir uppsjóvarfiskasløgum so sum norðhavssild, svartkjafti, lodnu og makreli. Haraftrat veksur veiðivirðið av uppisjóvarfiskasløgum stoðugt. Rækjuveiðan á Flemish Cap stendur við og hevur stóran týdning fyri rækjuflotan.

Veiðimøguleikarnir við Svalbard standa við, men Noreg hevur boðað frá eini nýggjari skipan, sum fer at minka um veiðimøguleikarnar. Hetta er tó í tráð við tað veruligu veiðuna hjá londunum, sum hava veitt á hesi leið. Landsstýrið hevur ikki góðtikið hetta, men fer at samráðast við Noreg um hetta mál.

Stórur áhugi er fyri at menna okkara fiskiskipaflota eftir svartkjafti, norðurhavssild og makreli. Skip eru komin til landið og onnur verða útskift, sum fara at viðgera hesa fisk til hægri søluvirði. Hetta er skilagott,

men í viðgerðini av hesum verður neyðugt at taka hædd fyri millumlanda fiskivinnuavtalum.

Økt samstarv við russar um norðhavssild og makrel kann fáa størsta týdning fyri okkara veiðimøguleikar eftir hesum fiskasløgum og fyri samvinnu um nettindi í Barentshavinum í framtíðini.

Makrelur er í føroyskum sjógvi einar fyra mánaðir um árið, men tað, at vit hava eina bindandi avtalu við ES um býtið av makrelinum ger, at vit ikki fáa brúkt hetta tilfeingið, sum vit kundu ynskt. Svartkjaftarin verður skjótt eitt virðismikið tilfeingi. Vit skulda havt nógv størri veiðiorku sjálvir á hesum stovni. Nakað bendir á, at so verður, tí er neyðugt at hugsa um at fáa hesa ferðandi stovn býttan, áðrenn veiðikapasiteturin hjá øðrum verður øktur.

Samanumtikið kann sigast, at føroysk skip hava størri veiðimøguleikar eftir uppsjóvarfiski í 1997 enn nakrantíð. Tað er umráðandi, at hesin partur av veiðiflotanum verður mentur, og at skipað verður so fyri, at kvoturnar verða fiskaðar, bæði fyri at fáa virðini til høldar og fyri at standa seg betur, tá kvotur verða ásettar.

Í løtuni er eingin framleiðsluorka í landinum at virka norðhavssild, og bert eitt skip er komið aftrat í veiðiflotan, sum kann virka uppsjóvarfiskasløg umborð. Landsstýrið virkar fyri, at veiðitúlini og framleiðsluliðið verða før fyri at meirviðgera uppsjóvarfiskasløg. Í kvotabýtinum komandi ár verður hyrgt upp fyri, hvussu stórur partur skal fara til matframleiðslu.

Royndirnar at menna fiskiskap á djúpum vatni uttanfyri 200 fjórðingar koma undir ST-sáttmálan um spjaddar og langt ferðandi stovnar og semjuna um fiskiskap við ábyrgd. Svartkalva og kongafiskastovnarnir eru felagsstovnar, sum eru serstakliga illa fyri. Føroyar, Ísland og Grønland hava tikið stig til at samstarva um at verja stovnarnar.

Í samráðingunum um býtið av norðhavssildini og í viðgerðini av ferðandi fiskastovnum í NEAFC hevur eisini verið íðiliga víst til somu semjur, høast tolkingarnar av greinunum ofta vóru sera ymiskar. Eftirsum okkara áhugamál skulu verjast í altjóða samráðingunum, verður miðað ímóti eisini at hava serkøn fólk, ið burturav arbeiða við altjóða havrætti.

Fyrireikingar verða í løtuni gjørdar at leggja ST-sáttmálan um spjaddar og langt ferðandt stovnar fyri løgtingið.

Flakavirkisvinnan
Búskaparliga støðan í fiskivinnuni er ikki batnað nógv nógv, høast størri veiði enn ventað. Flakavirkisvinnan liggur tungt í sjónum, og heimaflotin við minkandi íløgustuðli og lønarstuðli til fiskimenn má tillaga seg tey viðurskifti, sum nú standa fyri framman. Ein meinbogi hjá flakavirkisvinnuni er, at rakstraravlopið er ov lítið.

Landsstýrið ger í hesum døgum saman við pørtum í vinnuni eina skipan, sum fer at geva virkjum møguleika fyri at sleppa framat at keypa so stóra nøgd sum møguligt av tí fiski, sum veiddur verður við Føroyar. Miðað verður ímóti, at so stórur partur sum møguligt verður boðin út til sølu í Føroyum, men at nakað kann verða selt beinleiðis uttanlands, har serligar umstøður gera seg galdandi.

Fiskidagarnir verða í slíkum føri roknaðir, til skip er komið í landingarhavn. Fyri allan fisk, sum fer óvirkaður av landinum, skal útflytarin prógva, at fiskurin hevur verið alment boðin út í Føroyum. Henda skipan kemur í gildi 1. september, tá nýtt fiskidagaár byrjar. Vónandi kann hon gera sítt til, at størri nøgd av fiski verður virkað í Føroyum.

Dentur verður lagdur á at stuðla royndum at virka størri part av fiski okkara. Størsta íkastið kann gerast norðhavssildin, og tað sæst longu nú, at sildin mennist skjótt, og er komin aftur í føroyskan sjógv í nógv størri

mun enn mett.

Tað hevur stóran týdning, at vinnuvirki okkara standa seg í góðsku í kappingini við onnur lond og kunnu lúka krøvini frá keyparunum. Vinnan hevur ábyrgdina av, at hon fylkir krøvini, ið innanmeftirlitið setur. Almennu myndugleikarnir skulu studla tilevningini av innameftirlitskipanum, góðkenna tær og hava eftirlit við, at tær verða fylgdar. Dentur verður lagdur á at fremja hesa skipan, so vit í minsta lagi eru ájavnt við okkara kappingarneytar og helst fremri, tá tað ræður um góðsku.

Hvalaveiðimál
Landsstýrið heldur fast um, at súgdjór í havinum verða gagnnýtt á burðardyggan hátt og virkar fyri øktum samstarvi við aðrar tjóðir. Dentur verður lagdur á viðurskifti, sum ávirka hval og kóp.

Í arbeiðnum í NAMMCO, sum fevnir um burðardygga umsiting av súgdjórunum í Norðuratlantshavi, lúka Føroyar treytirnar um millumlandasamstarv, sum ásett í havrættarsáttmálanum. Harumframt er karmur gjørdur um vísindaligt samstarv, sum skal tryggja burðardygga gagnnýtslu av súgdjórunum í føroyskum sjóøki.

Á fundi í Føroyum í juni mánaði vísti NAMMCO sín fortreika sum ein felagsskapur, ið er førur fyri at veita vísindaliga ráðgeving. Hann prógvaði, at føroyskt grindadráp ikki er eitt hóttan móti grindastovninum.

Sjóvinnumál
FAS skipanin verður endurskoðað, og tilmæli verður gjørt at bøta um kappingarføri føroyinga í farmasigling.

Fyri at menna kappingarførið á handilsskipum og at veita fiskiskipum lættari atgongd til fiskirættindi, varð ein Bareboatskipan sett í verk í vár. Skipanin er galdandi í báðum skrásetingum og virkar báðar vegir. Føroysk skip kunnu verða skrásett undir fremmandum flaggi og útlendsk skip kunnu verða skrásett undir føroyskum flaggi samhært sáttmála millum føroysk og útlendsk reiðarafeløg.

Skipanin hevur stóran týdning fyri føroysk fiskiskip, har Føroyar kunnu fáa atgongd til fleiri veiðimøguleikar í sjóøki hjá londum, sum Føroyar samstarva við.

Fyri at lúka nýggju krøvini frá IMO og tað vaksandi eftirlitið við handils- og fiskiskipum krevst, at allir sjómenn innan árslok 1998 hava lokið trygdarskeið fyri at kunna starvast á skipi. Á fíggjarlógini er peningur avsettur til trygdarmiðstøð, men skerjingar gera tað trupult at skipa so fyri, at allir sjómenn kunnu fáa trygdarskeið innan ásettu tíð, og tí mugu leita sær uttanlands. Landsstýrið roynir at finna eina loysn á hesum máli.

Sjómanslógin, sjóvinnulógin og manningarlógin verða endurskoðaðar. Broyting er gjørd í manningarlógini fyri at lúka altjóða krøv, um havdálking skuldi ført til endurgjald. Arbeiðsumhvørvið á handils- og frystiskipum verður betrað.

Vinnumál

Alivinna
Útflutningurin av alifiski vaks úr 6.000 tonsum í 1995 uppí 14.000 tons í 1996 og í virði úr 173 milj. kr upp í 326 milj. kr. Roknað verður við, at framleiðslan í minsta lagi heldur sær á hesum støði.

Í 1992 var alivinnan sera illa fyri. Tað almenna noyddist at veita vinnuni tílíkan marknaðan stuðul fyri at koma fyri seg aftur. Onnur tiltøk sum fakkað alifoyvi, fiskasjúkutænasta og trygdargrunnur alivinnunnar kunnu nevnast. Í samstarvi við vinnuna og fíggingarstovnar hevur arbeiðið at fáa hesa vinnu á beint aftur eydnast so mikið væl, at alivinnan nú kann sigast at standa á egnum beinum.
Tiltøk eiga at virka menningi og elva til økta framleiðslu og aling av nýggjum fiskasløgum við neyðugum fyrivarni fyri umhvørvinum.

Saman við p/f Fiskaaling verður meira gjørt við kynsbótararbeiðið og royndirnar at ala kalva. Fyri at økja um framleiðsluna verður løgd ein miðvís ætlan at menna tøknina at ala á minni vardum økjum.

Neyðugt er, at góðskan á alifiski verður betrað og at meira fæst burturúr fiskinum, soleiðis at alivinnan kann geva uppaftur meira av sær.

Íðnaður
Íðnaður og tænastuvirksemi hava havt munandi framgongd seinastu árini. Serliga er at fegnast um, at gongd er komin á útflutningin. Føroyskar fyritøkur eru kappingarførar íman so ymiskar greinar sum skipabygging, útgerð til skip, reingerðarvørur og entreprenør- og handverksvirksemi.

Fyri at stuðla undir framgongd á hesum øki er neyðugt at halda fast við kósina hjá samgonguni at bøta um kappingarførið við at lækka kostnaðarstigið, avtaka forðandi og tyngjandi gjøld, at betra um verandi marknaðaravtalur og at gera nýggjar, sum stórur tørvur er á.

Vinnuframi
Danskar vinnuframalógir eru settar í gildi í Føroyum, og tað hevur givið nýggjar møguleikar at stuðla nýggjum vinnum. Ein trupulleiki hevur verið, at ringt er finna fram í teimum møgnleikum sum eru og at fáa greina verkætlanir, sum saman við almenna stuðlinum kann útvega neyðugu egin- og bankafiggingina. Ein tøknilig kunningarstova, TK-stovan, er sett á stovn júst við tí endamáli at veita fyritøkum og persónum, sum ætla undir egið virksemi, ráð og vegleiðing.

Farið er undir at endurskoða allar grunnar og vinnuframaskipanir fyri at gera hesi liðiligari og gera tað lættari hjá fyritøkum og einstaklingum at fáa hjálp og ráð.

Virksemi og viðtøkur Framtaksgrunsins verða endurskoðaðar í heyst. Hóast bráktar eru umanfyri 100 milj. kr., so eru uml. 90 milj. kr tøkar. Verður farið skynsamliga fram, kunnu tær gerast eitt gott ískast at menna nýggjar vinnur í Føroyum.

Nærum ongar nýloygur eru gjørdar í fiskiskip seinastu árini. Nevndin, ið landsstýrið setti í fjør at kanna figgingarmøguleikar til skipabygging, hevur latið landsstýrinum frágreiðing. Landsstýrið fer í heyst at leggja uppskot fyri tingið um serliga skipan fyri bygging av fiskiskipum í Føroyum.

Lóg um kapping varð samtykt í vár. Lógin byggir á meginreglina um eftirlit heldur enn forboð. Hetta skuldi verið ein smidligari skipan, við tað at lógin forðar fyri brotsverkum í vinnuni í tann mun, tað er neyðugt.

Sølufeløg
Størsta sølufelagið Faroe Seafood varð endurstovnað undir heitinum Faroe Seafood Prime. Neyðugt er við einum sterkum sølufelag, skulu vit standa okkum í altjóða kappingini. Drúgv tíð gongur, áðrenn úrslit av marknaðarføringar- og søluarbeiði vísa seg.

Onnur sølufeløg eru eisini. Fyri at stuðla hesum hevur Menningarstovan skipað fyri og hjálpt til, tá føroyskar fyritøkur hava synt fram á vørumessum uttanlands.

Ferðavinna
Dentur verður lagdur á at menna ferðavinnuna, sum gevur eitt gott ískast til búskapin. Ferðaráðið arbeiðir saman við vinnuni fram móti málinum at fáa 50.000 ferðafólk til landið í ár 2002. Vøkstur er í vinnuni ár undan ári og metti verður, at ferðavinnan nest eftir fiski- og alivinnuni er tann vinnugrein, ið gevur landinum mestan pening uttaneftir.
Samstarvsavtala um ferðavinnu, nevnd FITUR, er gjørd við Ísland. Avtalan hevur til endamáls at økja ferðingina Føroya og Íslands millum og at samstarva um felags marknaðarføring. Eins og dentur verður lagdur

á at marknaðarføru Føroyar úteftir, verður arbeitt við innlendis menning.

Landbúnaðarmál
Nevndin, sum sett varð at endurskoða og gera uppskot um neyðugar lógarbroytingar fyri framtíðar landbúnað, er liðug við arbeiði sítt.

Spurningurin, sum støða skal verða tikin til sambært álitinum er, hvørt landsjørðin skal privatiserast, og hvussu landsjørðin framyvir verður skipað.

Við støði í hesum arbeiði verða neyðug lógaruppskot gjørd, sum kunnu tryggja, at landbúnaðurin kann mennast, soleiðis at náttúrutilfeingið við atliti til náttúruvernd verður røkt, og búnaðarvørur verða kappingarførar bæði í prísi og dygd.

Samskiftismál
Fjarskifti
Í farnu tingsetu varð alt málsøkið telegraf- og telefonmál formliga yvirtikið, eisini uttanlandssamskiftið við útbúnaði til CANTAT-3 kaðalin.

Lóg um fjarskifti varð samtykt í farnu tingsetu. Lógin hevur munandi broytingar við sær á fjarskiftisøkinum. Nú er staðfest, at heimastýrið hevur einkarætt til alt økið, og at ein ella fleiri fyritøkur kunnu fáa serloyvi at reka fjarskifti. Slíkt serloyvi kann fevna um kervið sjálvt og um tænastur á kervinum. Nýggja fjarskiftislógin gevur møguleikar at fylgja við í altjóða tillaging og menning á fjarskiftisøkinum.

Fyri at Telefonverk Føroya Løgtings skal kunna standa seg í kappingini á einum fríari marknaði, er neyðugt, at Telefonverkið verður skipað sum eitt óheft felag, t.d. sum eitt partafelag, og verður uppskot lagt fram í næstum.

Uppskot til nýggja lóg um postvirksemi og Postverk Føroya verður fyrireikað. Leisturin verður lógarsmíðið fyri fjarskiftisøkið, tí tað, sum vanliga hevur ligið undir postøkinum, er somuleiðis fyri liberaliseringum. Lógarkarmarnir verða tillagaðir samsvarandi.

Tilbúgvingaractlan fyri Føroyar verður fyrireikað, soleiðis at vit kunnu vera á hædd við ommur lond, tá tað ræður um at bjarga mannalívi og avmarka skaðar, um større vanlukkur skuldu hent á føroyskum land- ella sjóøki. Allir neyðugir myndugleikar og feløg verða samskipað í eina tilbúgvingaractlan.

Flutningssamband
Tá hugsað verður um út- og innflutning av vørum, so er flutningssambandið nøktandi, tó kundu fráferðirnar úr Føroyum verið spjaddar meira, tá um útflyting av ferskum fiski ræður.

Í samband við at Skipafelagið Føroyar tók yvir flutningssambandið til Skotlands, eydnaðist tað ikki at varðveita ferðafólkasambandið. Regluligt ferðafólkasamband eigur at vera millum Føroya og Bretlands, loftvegis ella sjóvegis.

Nú røkist so fyri, at beinleiðis sjófarleið verður tikin upp aftur í summarmánaðunum komandi ár. Møguleikin fyri reguligum flogsambandi til Bretlands alt árið verður kannaður.

Miðalalduriin á skipunum hjá Strandfaraskipum Landsins er 30 ár. Neyðugt verður sum skjótast at byggja ella at keypa skip. Nevnd arbeiðir við eini langtíðaractlan fyri alla innlendis samferðslu á sjógvi og landi, eitt nú vega- og bergholsgerð, flogvallar- og havnagerð, umframt bygging ella útvegan av strandfaraskipum. Ein langtíðaractlan er eitt gott grundarlag undir politisku raðfestingini, so vit samfelagsliga fáa sum mest fyri pengarnar.

Atlantsflog gevur yvirskot annað ár á rað. Konsolideringartilgongdin í flogfelagnum styrkir grundarlagið undir einum øktum virksemi, bæði viðvíkjandi verandi ferðafólkaflutningi og nýggjum virkisøkjum, eitt nú eini oljuvinnu.

Uppskot til broytingar í ferðslulógini verða lagdar fyri tingið í næstum, m.a. umfatandi lægri promillumark og broyttar ásetingar fyri mest loyvdu ferð.

Bileftirlitið er farið í holt við at skifta gomul koyrikort út við nýggj, sum geva føroyingum rætt til at koyra við føroyskum koyrikorti í ES-londum.

Kunningartøkni
Kunningartøkni og elektroniskur infrastrukturur verða raðfest ovarliga. Ein KT-bólkur við umboðum frá vinnuni og tí almenna er í bolt við at leggja ein kunningartøknipolitikk til rættis. Vinnumálastýrið fær ábyrgdina av, at stevnumiðini verða sett í verk. Ætlanin er, at eitt KT-forum við umboðum frá styrum og stovnum innan landsumsitingina skal samskipa verkætlanir í landsumsitingini. Fyrsta stig at skipa eitt datasamskiftis net fyri landsumsitingina er um at verða liðugt. Netið verður gjørt í samstarvið við telefonverkið.

Orku- og umhvørvismál
Orkumál
Elmegi
Elfelagið SEV er nú farið undir vatnorkuútbyggingina í Eysturoynni, nevnd Eiði 3. Alt arbeiðið er mett til 111 mió. kr. SEV eginfíggjar tær 71 mió. kr, og landsstýrið hevur givið SEV lánsloyvi til tær frestandi 40 mió kr. Arbeiðið er mett at taka eini tvey ár.

SEV lækkaði elprísin 3 oyru/kwh í fjør og á nýggjárinum 6 oyru/kwh. Væntandi verður hetta gongdin, hóast vatnorkubyggingin verður framd.

Umhvørvismál
Umhvørvisvernd
Umhvørvi og umhvørvisvernd hava ein týðandi leiklut, tá talan er um at geva vinnuni kamar. Tað gerst alt meira vanligt, at fyrilit fyri umhvørvinum er ein partur av politikkinum hjá fyritøkum. Hesi gongd ástu føroyskar fyritøkur at givið gætur. Ein slíkur hugsunarháttur fer at stuðla vinnugreinum sum fiskivinnu og ferðavinnu.

Fyri at tálma havdálking verður OSPAR-konventiónin løgd fyri løgtingið til góðkenningar. OSPAR-konventiónin setur forboð fyri at føra og søkkja dálkievni í havið.

Ætlanir eru um nýggja havumhvørvislóg fyri Føroyar, har atlit til eina framtíðar oljuvinnu er týðandi partur. Landsstýrið hevur sett bólk at gera uppskot hesum viðvíkjandi, eins og uppskot til eina hóskandi fyrisitingar- og eftirlitsskipan. Krøvini í OSPAR-konventiónini verða løgd inn í nýggju havumhvørvislógina.

Samskipan
Fleiri kommunur luttóku í eini verkætlan við kommunalum umhvørvisætlanum við stuðli úr landskassanum og Norðurlendska Ráðharraráðnum. Hetta hevur stóran týdning fyri kommununar, og hildið verður fram soleiðis, at allar kommunur kunnu verða við og fáa ráðgeving frá einum umhvørvissamskipara, sum landið og kommununar fíggja í felag.

Burturbeining av burturkasti er ein týdningarmikil liður í umhvørvisarbeiðinum, sum fyri megin partin verður fyriskipað av IRF og Tórshavnar Kommunalu Bremistoð á hvørt sínum geografiska øki. Viðvíkjandi jarnburturkasti og tí vandamikla burturkastinum, so sum kemisk evni o.a., verður ásannað, at skipanin ikki nóg væl nøktar tørvin á skilagóðari burturbeining. Kannað verður, hvussu hetta kann skipast á fullgóðan hátt.

Lógaruppskot verður lagt fyri tingið hesum viðvíkjandi.

Landsstýrið letur stuðul til ymisk umhvørvisverndartiltøk. Nevnast kann, at stuðul varð latin til kappingina um "reinastu bygd" í ár.

Arbeiðsmarknaðarmál
Fleiri lógaruppskot viðvíkjandi arbeiðsmarknaðinum verða løgd fyri løgtingið í hesi tingsetu.

Uppskot til lóg um arbeiðsumhvørvi við smávegis broytingum verður lagt fram aftur í heyst. Føroyar verða tá á sama støði í arbeiðsumhvørvislógarmálum sum Norðurlond.

Arbeiðsmarknaðareftirlønargrunninum hyrjaði at gjalda út 1. apríl í ár. Øll 67 ára gomul og eldri fáa 500 kr. um mánaðin, sum eru skattskyldugar.

Nýggj lóg um ALS varð samtykt í vár. Talan er ikki um stórvegis broytingar, men skipanin skal gerast einfaldari at umsita.

Útgjaldsupphædd og útgjaldstíðarskeið er sett í lógina. Tíðarskeiðið verður verandi 3 ár og 2 mánaðir. stýrið ásetir inngjaldsprosentið, sum hægst kann vera 2,5%. Inngjaldið verður 2,25% frá 1. januar 1998.

Viðvíkjandi arbeiðsávísingini verður miðað ímóti, at arbeiðsgevarar, arbeiðstakarar og arbeiðstøk, brúka ávísingina, sum hevur tingið roynd og serkunnleika í at ávísa arbeiði uttanlands, har nógvir føroyingar hava arbeitt.

Í ár eru 6 mió kr. avsettar til arbeiðsskapandi tiltøk fyri ung, sum kommununar skipa fyri. Ein samskipari verður settur á Almannastovuni at skipa fyri aktivering eftir forsorgarlógini.

Almanna- og heilsumál
Almannamál
Rammulóg
Rammulóg fyri almannaøkið varð viðtikin í 1994, sum ásetti, at allar fólkatingslógir á almannaøkinum skuldu gerast løgtingslógir. Hetta var ein partur av avtaluni millum landsstýrið og donsku stjórnina.

Hetta er eitt umfatandi lógarverk, men skjótil er settur á. Løgtingslóg um bamagjald til einsamallar uppihaldarar o.o. varð samtykt 1996. Lógin um sosialar pensjónir verður løgd framaftur í hesi tingsetu . Henda lógin kom ístaðin fyri ta gomlu fólka- og avlamispensjónslóggávuna og ásetingarnar um einkjupensjón og lóg um uppískoytisveiting til einkjur. Næst á skránni er lógin um dagpening, sum væntandi verður løgd fyri tingið í hesi tingsetu.

Eftir er so forsorgarlógin sum er sera umfatandi. So skjótt sum lógin um dagpening er avgreidd, verður farið í holt við at gera eina nýggja forsorgarlóg, sum nøktar tørvin og hóskar til eitt nútíðarsamfelag.

Heimarøkt
Nú ið heilsusjúkrasystra-, heimasjúkrasystra- og heimahjálparaskipanirnar eru samanlagdar í eina stovn, Heimarøktina, hevur landsstýrið endurskoðað lógir og kunngerðir fyri at laga tær til heimarøktarskipanina. Løgtingslógir um heilsusystrar, heimasjúkrasystrar og broyting í løgtingslóg um almenna forsorg vórðu lagdar fyri tingið í farnu tingsetu og verða lagdar framaftur. Tá hetta arbeiðið er liðugt, er bert barnaforsorgarlógin eftir.

Samhýli
Á serforsorgarøkinum verður hildið fram við at finna skilagóðar loysnir. M.a. sambýli til menningartarnað

eru ein liður í hesum royndum. Eitt eldrasambyli er opnað í Kollafirði. Í Vestmanna eru hús keypt til eldrasambyli, sum verður latið upp í ár. Hesi sambyli eru væl umtókt.

Í Sundoynni verður roynt at sameina røktarheimsrakstur og heimarøkt í einum. Eydnast henda skipan, verða hesar ein partur av arbeiðnum at betra um viðurskiftini hjá okkara eldru borgarum.

Arbeiðið at byggja verkstaðið Vón uppaftur gongur eftir ætlan, og væntandi kann verða flutt inn í nýggj og hóskandi høli nakað skjótt.

Heilsumál
Sjúkrahúsráð
Sjúkrahúsráðini hava virkað síðan mars mánað. Løgtingsmenn, bygdaráðs- og bygdaráðsmenn og starvsfólk í heilsuverkinum kunnu ikki sita í ráðnum.

Sjúkratrygging
Løgtinglóg um "lov for Færøerne om offentlig sygesikring" varð broytt í vár. Við hesum verður inntøkumarkið fyri A og B limir í sjúkrakassanum avlikið. Kravt verður, at A-limir hava ein fastan lækna, men kunnu skifta eina ferð um árið, meðan B-limir kunnu skifta lækna, tá ið teimum hóvar. C-limaskapurin er avlikin. Aldursmarkið fyri limaskap er hækkað úr 16 upp í 18 ár.

Gamla skipanin var óheppin, tí nógv fóru seg ikki tryggjað. Í okkara grannalondum eru øll fólk tryggjað undir sonn treytum. Hetta er nú eisini galdandi í Føroyum. Nógv fólk vóru B-limir, bóast tey ikki høvdu ráð til hetta. Avleiðingin av hesum var, at tey aftraðu seg at søkja læknahjálp. Tað sama var galdandi fyri C-limir.

Nýggj kunngerð um heilivág varð sett í gildi í mai. Nú er tað apotekið, og ikki læknin, ið hevur ábyrgdina av at útflyggja tann bíligasta og synonyma heiliválin. Fyrimunurin er, at tann bíligasti heiliválurin á marknaðinum verður útflyggjaður.

Nýggj kunngerð um flutnings- og ferðarendurgjald fyri sjúklingar uttanlands verður í sett í gildi í næstum. Samtbert hesi kunngerð fáa fleiri avvarðandi møguleika fyri at fáa ferðarendurgjald, tá tey eru um sjúklingar, ið verða sendir til viðgerðar uttanlands.

Hildið verður fram at endurskoða heilsulóggávuna sambert avtalu við donsku stjórnina.

Undirvísingar- og mentamál
Skúlamál
Nýggj fólkaskúlalóg
Nýggja fólkaskúlalógin er samtykt av løgtinginum og kemur fyrsti parturin av henni í gildi 1. august næsta ár. Broytingarnar í nýggju fólkaskúlalógini í mun til galdandi lóg eru m.a., at 7 ára undirvísingarskyldan verður broytt til 9 ára undirvísingarskyldu, og at møguleiki er hjá skúlunum at hava forskúla. Harnæst eru lærugreinatilboðini dagførd og munandi økt.

Uppskot til nýggja lóg um yrkisúthúgvingar og nýggja lóg um yrkisskúlar verða løgd fyri tingið í heyst.

Uppskot til lóg um almanna- og heilsuútbúgvingar á miðnámsstigi verður lagt fyri tingið í hesi tingsetu. Ætlanin er, at fara undir útbúgvingina í august næsta ár.

Landsstýrismaðurin hevur sett ein arbeiðsbólk til at endurskoða lógina um lærarautbúgving.

Lóggávan um miðnámsútbúgvingar verður dagførd viðvíkjandi m.a. yrkisgymnasialum útbúgvingum.

Lógin um útbúgvingarstuðul verður í løtuni endurskoðað av einum arbeiðsbólki. Ætlanin er, at nýggj lóg um útbúgvingarstuðul skal fáa gildi 1. august næsta ár.

Granskingarráð
Í fjør kom lógin um granskingarráð í gildi. Ein miðlkr eru játtaðar til granskingarætlanir í ár. Granskingarráðið gevur landsstýrismanninum tilmæli í granskingarmálum og umsitur stuðulsumsóknir. Áhugi fyri at gera granskingarætlanir er so at siga innan allar vísindagreinir. Í fjør varð stuðul játtaður til eina granskingarætlan innan fiknavísindi.

Í vár kom sáttmáli millum Norðurlond um atgongd til hægri útbúgvingar í gildi. Uppskot til samtyktar verður lagt fyri løgtingið, so Føroyar verða fevndar av hesum sáttmála, sum gevur lesandi økeypis atgongd til flestu lærustovnar í Norðurlondum.

Arbeiðsbólkur er júst settur at gera eina virkisætlan um, hvussu kunningartøkni kann fáa størri útbreiðslu í fólkaskúlanum.

Nevnd er sett at gera uppskot til framtíðar útbúgvingarpolitikk, har útgangsstøðið m.a. verður sambandið millum útbúgving, gransking og vinnulív.

Mentamál

Loftmiðlalóg
Uppskot til nýggja loftmiðlalóg, sum skal fevna um virksemið hjá einum megin útvarpi og einum megin sjónvarpi, verður fyrireikað. Somuleiðis skal lógin fevna um nærútvarp og nætsjónvarp. Lógaruppskotið verður lagt fyri løgtingið í høvst og lógin kemur eftir ætlan í gildi 1. januar 1998.

Seinasta vetur fekk Sjónvarp Føroya loyvi at skipa fyri eydnuspæli. Iletta hevur bott munandi um innøkumøguleikarnar hjá stovninum.

Uppskot til ávísar broytingar í lógini um Føroya Landsskjalasavn verður fyrireikað.

Spurningurin, hvussu vit skulu varðveita mesta formminnið "Máría" í Kirkjubø, verður í løtuni viðgjørdur. Ætlanin er, at støðu verður tikin í hesum árinum. Uppskot til nýggja lóg um "friðing av formminnum" verður væntandi lagt fyri tingið fyrst í næsta ári.

Kirkjulóggávu
Arbeiðið at endurskoða kirkjulóggávunni heldur fram. Ætlanin er, at hava arbeiðið liðugt í hesi tingsetu. Tríggjar av kirkjulógunum vórðu til viðgerðar í tinginum í vár, men vórðu ikki avgreiddar. Hesar verða lagdar fram aftur fyrsta dagin.

Í seinasti tingsetu samtykti tingið ríkislógartilmæli til at seta í gildi fyri Føroyar nýggju donsku lógina um upphavsrætt.

Í fjør heyst varð avtala gjørd millum Grønland, Ísland og Føroyar um mentanarligt samstarv. Eitt av úrslitunum av hesi avtalu er listahandverkarastevnan, sum verður hildin í Føroyum í næsta mánaði.

Í løtuni verður arbeitt við uppskotum, sum viðvíkja eini norðurlendskari mentanarsáttmálu og "Nordisk kulturfond ".

Samantak
Úrslitini syna, at samgongusætlanirnar og politikkurin hava verið rætt. Stuðfesta høgtalini, skjón minkandi

arbeiðsloysið, vaksandi fyritakssemið í samfelagnum, tørvandi andstøðuppskotini og øll onnur fyribrigdi prógva hesa veruleika.

Tað hevur í stórum eydnast higartil. Tó hevði eg ynskt, og tað er longu nevnt, at vit høvdu megnað at vist líka stóran fastleika og eins stórt dirvi á vinnuøkjunum og á hinum politisku økjunum.

Men spurningurin er, um vit eru før fyri at halda fast um tey framstig, sum eru rokkin, og um vit eru før fyri at tryggja hesi framstig í komandi tíð.

Hóast langt er eftir á mál, tá tað snýr seg um at retta føroyska samfelagið uppaftur fíggjarliga og búskaparliga, so vísa tey seinastu hagtølini, at framgongdin er ikki so stór í dag, sum fyrra helming av valskeiðnum, hóast ótálmaðan fiskiskap og harav fylgjandi meirinntøkur. Kanska er hetta lutvíst orsakað av teimum tá nógv umrøddu sjálvtøkuborðunum í løgtingsins fíggjarnevnd.

Politiska semjan millum flokkarnar á løgtingi um at lata vera við at tálma fiskiskapinum í komandi fiskiári fer í fyrstu atløgu at geva meirinntøkur og møguleikar fyri nýggjum sjálvtøkuborðum. Hvør ávirkanin verður um nøkur ár, kann ein hugsa sær. Tað skuldi ikki verið so torført at gitt um úrslitið, um ein bæði skattar tilfeingið ov hart og nýtir meirinntøkuna á óneyðugan hátt.

Nýggja stýrisskipanarlógin, sum hevur verið grundarlagið undir okkara politiska arbeiði hetta valskeiðið, er so vísiliga innrættað, at hon ger týðiligan skilnað millum lóggevandi og útinnandi valdið. Hetta merkir fyri tað fyrsta, at Føroya løgting kann senda løgmann og samstundis alt landsstýrið til hás og fyri tað næsta kann løgmaður skriva út nyval.

Ongin orsøk er at nevna nyval nú minni enn eitt ár áðrenn valskeiðið er úti. Tó skal tað ikki vera nøkur loyna, at eg sjálvur leggi munandi størri vekt á at tryggja vunnin framstig og at halda fraun við einum sunnum framburðspolitikki, enn at toyggja valskeiðið heilt út í juli mánaða.

Eisini vóru fleiri politisk stórmál nevnd í byrjanini, sum Føroya løgting skal taka støðu til í komandi úri. Tað hevur stóran týdning, og tað skal vera mítt ynski, at avgerðirnar í hesum málum, sum fáa týdning fyri okkara samfelag langt inn í næstu øld, verða tiknar við so breiðari politiskari semju sum gjørligt.

Eg gleddist um í røðuni, at arbeiðsloysið væntast at koma niður á 9% úr heilum 20%-25%. Men hetta er lítil troyst fyri teir landsmenn, sum hetta snýr seg um, og teir landsmenn, sum rúmdu undan stóra arbeiðsloysinum.

Vit skulu eisini leggja doyin á at dagføra tær reglur, sum skulu hjálpa teimum, sum av ymiskum orsøkum ikki eru før fyri at arbeiða. Hesin veruleiki grundgevur eisini fyri, at vit verða nøgdi til at halda fram við einum skynsamum fíggjar- og búskaparpolitikki, soleiðis at so nógvir landsmenn sum gjørligt kunnu búleikast, og búleikast væl á hesum kletturn.

Við hesum orðum fari eg at bjóða løgtingi - samgongu og andstøðu - til eitt týdningarmikið, strævið og spennandi samstarv, sum skal tryggja okkum støðuga framgongd í samfelagnum.

Góða ólavsøku.

Løgtisti
Mál, ið Føroya landsstýri hevur í hyggju at framja.

Løgmál
Broyting í løgtingslóg um fólkamøvn

Broyting í løgtingslóg um almennar skráir

Broyting í løgtingslóg um skifti av deyðsbúgvi

Broyting í útlendingalógini

Broyting í revsilóginí

Fíggjar- og búskaparmál
Uppskot til fíggjarlóg fyri 1998

Uppskot til eykajáttanarlóg fyri 1998, august 1998 og oktober 1998

Lóg um skuldarsanering

Lóg um pensjónsskattaskipan

Nýggj lóg um arvaavgjøld

Broyting í løgtingslóg um meirvirðisgjald

Broyting í tolllóginí

Broyting í skrásetingargjøldum á motorakførum

Broyting í løgtingslóg um búskaparráð

Broyting í løgtingslóg um landsbankan

Broyting í løgtingslóg um bankar og sparikassar

Broyting í løgtingslóg um landsskatt og kommunuskatt

Broyting í løgtingslóg um áseting av skatti til landskassan:
- automatisering av sjálvuppgávum og ognaruppgerð
- líkningarprosessir og kæruskipanum
- rættartrygd borgaranna
- heimild at áseta í kunngerð frá Líkningarráð Føroya til landsstýrismannin
- serskatting av hjúnum
- nýggj skipan til skatting av fiski- og sjómonnum
- lóggáva um kolvetnisskattaskipan
- uppskot um nýtslu av inntøkum frá kolvetnisskatti
- skattur av vinningi frá spæli
- vinningsbýtisskattaskipan
- fusiónsskattalóg - móður/dóttirfelóg

Løgtingslóg um norðurlendska tvískattaskipan

Skattaavtalur við onnur lond

Broyting í løgtingslóg um at avmarka løn í sambandi við sjúku.

Uppskot til løgtingslóg um frávik frá karensdagaskipanini, um sáttmálafrídagar verða alfurhornir.

Kommunumál
Løgtingslóg um nýggjan kommunubygnað

Nýggj løgtingslóg um býarplanir og byggisamtyktir

Nýggj løgtingslóg um býarskipanir og byggisamtyktir

Fiskivinnumál
Broyting í løgtingslóg um vinnuligan fiskiskap. LL nr. 28 frá 10. mars 1994 við seinni broytingum.

Løgtingslóg um ábyrgd fyri lánum til fiskamjøl og lýsi v.m. verður longd.

Broyting í løgtingslóg um inn- og útflutning av fiski- og fiskaúrdráttum. LL nr. 70 frá 13.05.1992.

Broyting í løgtingslóg um fløgustuðul. LL nr. 34 frá 04.03.1993 við seinni broytingum.

Broyting í løgtingslóg um mánaðarligan minstaforvinning

Broyting í lóggávuni viðvíkjandi inntøkutrygd

Broyting í løgtingslóg um uppheggingarstuðul. LL nr. 46 frá 30.03.1990 við seinni broytingum.

Broyting í løgtingslóg um stuðul til menning av fiskivinnuni á landi. LL nr. 70 frá 10.05.1994 við seinni broytingum.

Broyting í "Størri verkætlanum". § 5 á fíggjarløgtingslógini.

Nýggj lóggáva um fløgustuðul til endurnýgging av skipaflotanum

Sjóvinnumál
Broyting í løgtingslóg um sjóvinnu. LL nr. 16 frá 03.03.1988 við seinni broytingum.

Broyting í manningarlógini. LL nr. 5 frá 15.01.1988.

Broyting í sjómanslógini. LL nr. 4 frá 15.01.1988.

Broyting í myndstringarlógini. LL nr. 67 frá 09.06.1988 við seinni broytingum.

Broyting í sjólógini. Lóg nr. 56 frá 01.04.1892, jvfr. Lk. nr. 141 frá 01.04.1985.

Vinnumál
Nýggj løgtingslóg um vinnuframa

Nýggj løgtingslóg um kolvetnisvinnu

Nýggj løgtingslóg um djóralæknavirksemi

Nýggj løgtingslóg um Heilsufrøðiligu Starvsstovuna og Landsdjóralæknaembætið

Nýggj løgtingslóg um marvørutryggleika

Nýggj løgtingslóg um vakstrarhúsgrunn

Broyting í løgtingslóg um sjúkur hjá djórum

Broyting í ymiskari jarðarlóggávu

Broyting í løgtingslóg um tryggingarvirksemi

Broyting í løgtingslóg um innflutning og sølu av rúsdrekka

Broyting í løgtingslóg um Ferðaráð Føroya

Ríkislógartilmæli til ríkislóg um Eksportkreditfond

Samskiftismál
Nýggj løgtingslóg um postvirksemi

Nýggj løgtingslóg um Postverk Føroya

Nýggj løgtingslóg um Telefonverk Føroya Løgtings

Broyting í løgtingslóg um ferðslu

Umhvørvismál
Broyting í løgtingslóg um umhvørvisgjøld

Ríkislógartilmæli til ríkislóg um havumhvørvi

Lóg um smyrjioljugjald verður avtikin. Ístaðin kemur lóg um umhvørvisgjald á jarnvørum, kemikalium og smyrjiolju.

OSPAR-konventiónin um verju av havumhvørvinum í landnyrðingspartinum av Atlantshavinum verður løgd fyri tingið.

Arbeiðsmarknaðarmál
Uppskot til løgtingslóg um arbeiðsumhvørvi

Almanna- og heilsumál
Broyting í løgtingslóg um almenna forsorg

Broyting í almannalóggávuni

Broyting í løgtingslóg um dagpening
Broyting í løgtingslóg um barnaforsorg

Broyting í løgtingslóg um fólkapensjón

Broyting í heilsulóggávuni

Broyting í løgtingslóg um barnatannrøkt

Løgtingslóg um heilsusystrar

Løgtingslóg um heimasjúkrasystrar

Ríkislógartilmæli um lóg um sjúklingarygging

Ríkislógartilmæli um lóg um tannrøktarar

Ríkislógartilmæli um lóg um kliniskar diætistar

Undirvísingar- og mentamál
Nýggj løgtingslóg um yrkisútbúgvingar og yrkisskúlar

Nýggj løgtingslóg um almannа- og heilsuútbúgvingar á miðnámsstigi

Nýggj løgtingslóg um loftmiðlar (megin- og nærútvarp, megin- og nærsjónvarp).

Broyting í løgtingslóg um friðing av fornminnum v.m.

Broyting í løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um Føroya Landsskjalasavn.

Ríkislógartilmæli um at seta í gildi fyri Føroyar:
- Lov om folkekirkens økonomi
- Lov om ansættelse i stillinger i folkekirken m.m
- Lov om folkekirkens kirkebygninger
- Lov om medlemskab af folkekirken, kirkelig betjening og sognebåndsløsning
- Lov om bestyrelse og brug af folkekirkens kirker
- Lov om menighedsråd
- Lov om udnævnelse af biskopper og stiftsbåndsløsning
- Lov om begravelse og ligbrændning

Uppskot til samtyktar um "Nordisk kulturaftale".

Uppskot til samtyktar um "Nordisk kulturfond".

Løgtingið viðgjørdi í løgtingsfundum 4. og 5. august 1997 frágreiðingina.

101-2 Frágreiðing frá landsstýrismanninum í

mentamálum um inntøkugevandi tiltøk hjá Sjónvarpi Føroya

Ár 1997, 29. oktober, var í løgtinginum býtt út frágreiðing frá Sámal Petur í Grund, landsstýrismanni sbr. tingskipanini § 51 stk. 4, sum var soljóðandi:

1. Formlig viðurskifti

Sjónvarp Føroya rekur sjónvarpsbingospælið "Gekk" við tilhoyrandi eykaspølum við loyvi frá landsstýrismanninum í mentamálum, dagfest 5. februar 1997, við heimild í § 5, stk. 3 í løglingslóg nr. 141 um sjónvarp frá 20. desember 1996. Loyvið vísir til konsept, handað Undirvísingar- og mentanáladeild landsstýrisins av Sjónvarpi Føroya í desember 1996.

Føroyingar høvdu høvi at spæla Gekk fyrstu ferð fríggjakvøldið 21. februar 1997, og væntandi verður spæll 40 ferðir í hesum kalendaraárinum. Hendan frágreiðing byggir á royndirnar eftir 15 spøl - tvs. eftir fríggjakvøldið 6. juni 1997.

Spælið er fyrireikað og skipað soleiðis, at eingin spurningur kann setast við trygdina. Danska fyritøkan DEPA í Vordingborg, sum frammanundan hevur um hendi tilfík sjónvarpsspøl í fleiri londum, hevur serliga telduskipan, sum umframt at rokna møguleikar og hagtøl, eisini dregur í spælinum og tryggjar, at all fer fram eftir reglunum, og sum tað sømir seg.

Grannskoðarafyritøkan Rasmussen & Weihe í Havn hevur eftirlit við, at útbreiðslan av spælibeftum, peningastreymurin og spælið sjálvt verða skipað sambært lógum og reglum og annars, sum tað sømir seg. Stjórin í Sjónvarpi Føroya hevur mótvegis landsstýrismanninum í mentamálum ábyrgdina av spælinum og av, at tað verður samskipað, fyrireikað og sent sambært galdandi reglum og sum tað sømir seg.

Postverk Føroya skipar fyri útbreiðsluni av spælibeftum, sum verða seld í útvaldum krambúðum av ymsum slagi umframt posthúsunum og hjá avgreiðslupostbúðunum kring alt landið. Postverkið umsitur innkrevjing av peningi frá sølustøðunum og flytur sjónvarpsins part á serliga girokonto.

2. Endamál

Endamálið við spælinum er at tryggja Sjónvarpi Føroya eitt dyggari fíggjarligt grundarlag, so fyritøkan kann halda tørn og vónandi menna virksemi sítt. Umsetningurin av spælinum verður tí at býta millum umsitingarútreiðslur, vinningar og inntøku til SvF.

Í aðru atløgu verður miðað eftir at gera eina sending í sambandi við spælið, sum í sjálvum sær er undirhaldandi. Tó er treytin, at spælið og sendingin geva eitt nunandi nettoavkast til at styrkja SvF og til framleiðslu av øðrum føroyskum sendingum.

3. Ávirkanin á onnur spøl

Tað er meting sjónvarpsins, at "Gekkur" hevur ikki órógvað onnur spøl stórvegis. V4-spælið í Útvarpi Føroya hevur, síðani SvF fór undir sítt spæl, havt ein so stóran umsetning sum sjáldan áður. SvF hevur í ongum føri tingið ábreiðslu frá fyriskiparum av øðrum bingospølum. Hinvegin tykist tað at gerast alt meira vanligt, at hesi spølini verða kombinerað onkursvegna við Gekkaspælið.

4. Fíggjarviðurskifti

Sjónvarp Føroya lutar í spælinum burtur peningavinningar og/ella gávuvinningar. Sambært loyvisgrundarlagnum skulu peningavinningarnir og søluvirðini av gávuvinningunum í hvørjum fíggjarári sær tilsamans vera í minsta lagi 40 prosent av tí, sum eftir er av samlaða umsetninginum, tá allar framleiðslu- og distributiónsútreiðslur í sambandi við spælið og spælsendingarnar eru dignar frá. Sjónvarp Føroya kann tó velja at

luta burtur ein størri part av umsetninginum.

Eftir 15 spøl sá roknistykkið soleiðis út:

Nettoavkast tilsamans:	4,40 mió kr.
Av hesum latnar í vinningum:	1,80 mió kr. (40%)
Beinleiðis avlop:	2,60 mió kr. (60%)
Óbeinleiðis avlop *):	0,35 mió kr.
Avlop tilsamans til SvF:	2,95 mió kr.

*) Óbeinleiðis avlopið eru inntøkur, sum ikki stava frá sjálvum umsetninginum av spælinum, og sum soleiðis ikki verða goldnar av spælarunum. Talan er í høvuðsheitum um lýsingainntøkur, goldnar av vinnulívinum - herundir gávuvinningar latnar fyri lýsingavirðið og lýsingar, prentaðar í spælibeftunum.

Ilt er at meta um, júst hvussu stórar inntøkur SvF kann vinna árliga. Av tí at byrjað var nústani 21.februar 1997, verður ikki talan um eitt fult fíggjarár í fyrstu atløgu. Helst verða eini 40 umfør spæld í 1997. Haraftrat er eingin vissa fyri, at tann stóri áhugin at spæla heldur sær. Tað telur hinvegin positivt, at SvF tíðliga í heyst kann knýta nýggj eykuspøl til høvuðsspælið. Varliga kann verða mett, at Sjónvarp Føroya kann vinna einar 7-8 milliónir krónur um ári av spæli.

Gekkaspælið og tilhoyrandi eykaspøl økja soleiðis avgerandi um inntøkurnar hjá Sjónvarpi Føroya, og tí kann samanumtikið sigast, at spøtini eru ein góð inntøkukelda fyri alonenna loftmiðlaskipanina sum heild. SvF er kortini morandi vetri fyri fíggjarliga enn samsvarandi sjónvarpsstøðir í øðrum londum. Av tí at fyritøkan eisini noyðist at konsolidera seg og at gera risastórar tekniskar fløgur (fyri einar 10-12 milliónir krónur tilsamans árini 1997-99), bevur hon allar møguligar inntøkur fyri neyðini.

Sjónvarp Føroya mælir tí til, at ongar skerjingar verða í spælinum ella í øðrum inntøkum. Framleiðsla av sjónvarpstilfari er sera dyr, og føroyska rásin kann nú loksins seta sær mál.

Gekka-spælið "Skrubban"

Sum løgtingslimum kunnugt, so stóðust trupulleikar av Gekka-spælinum "Skrubban", sum førdu til, at SvF fyribils steðgaði spælinum.

Ein menniskjansligt villa í arbeiðinum hjá framleiðaranum av "Skrubbuni" gjørdi, at ov nógvir vinnarar vóru í fyrstu útgávuni av spælinum.

Tað er enn ivasamt, um SvF hevur skyldu til at gjalda allar vinningarnar. Løgfrøðingar arbeiða enn við hesum spurningi, eins og við spurninginum um møguligt endurgjaldskrav frá Sjónvarpi Føroya móti einum av útlendsku samstarvsfeløgunum.

Sjónvarpið hevur tó ikki í hyggju at royna samskiftið við spælararnar í rættinum. Eitt er at hava góð viðurskifti við hyggjararnar, sum bæði eru viðskiftafólk og "trigarar" av stovninum. Tað hevur stóran týdning fyri sjónvarpið, at føroyingar hava álit á stovninum bæði so og so.

Leiðslan í Sjónvarpi Føroya heldur, at tað hevði gjørt størri skaða enn gagn (eisini fíggjarliga) at gjørt spurningin til eitt rættarmál. Hon hevur tí lagt størri dent á at avmarka skaðan, og hetta hevur eydnast væl eftir umstøðunum. Sjónvarpið bar skjótt at, tá stovnurin gjørdist varugur við villuna í "Skrubbuni", og trupulleikin varð loystur so skjótt og væl, at "Skrubban" væntandi framvegis fer at geva SvF eitt avlop - um enn væl minni enn upprunaligа mett. "Skrubban" gerst sostatt ikki ein fíggjarligur smeitur fyri stovnin. Í longdini fer hon hinvegin at geva stovninum eitt fitt fkast.

Lýsingar/stuðlar

Aftrat eydnuspælinum "Gekkur", hevur Sjónvarp Føroya eisini havt inntøkur frá lýsingum/stuðlum.

Byrjað varð at senda lýsingar í sjónvarpinum 1. september 1989, og hevur árliga inntøkan seinastu árini liðið um 3 mió. kr.

Fyrra hálvár 1997 hevur inntøkan verið á leið tann sama sum fyrra hálvár í 1996. Roknast kann tí við, at samlaða inntøkan frá lýsingum/stuðlum í 1997 verður um 3 mió. kr.

Løgtingið umrøddi 6. november 1997 frágreiðingina.

101-3 Frágreiðing frá landsstýrismanninum í fiskivinnumálum um endurnýgging av skipaflotanum

Ár 1997, 29. oktober, gav Jóhan Petersen, landsstýrismaður, løgtinginum frágreiðing sbr. tingskipanini § 51 stk. 4, sum var soljóðandi:

Vísandi til § 51, stk. 4 í Tingskipan Føroya Løgtings skal við hesum verða víst til ætlan landsstýrismanna í hesum máli sum niðanfyri standandi:

Landsstýrið setti bin 16. juli 1996 eina nevnd at kanna og gera tilmæli viðvíkjandi stuðulsloggávu og fígging annars í sambandi við skipabyggingar.

Um støðuna í veiðiflotanum verður vist til frágreiðingina frá endurskoðanarnevndini, har í frágreiðingini og viðmerkingunum eins og tilmælinum verður gjølla sagt frá, hvør støðan hjá veiðiflotanum undir Føroyum er. Skipini eru ov gomul og bera seg ikki við verandi fíggingarmøguleikum, veiðimøguleikum og framleiðsluháttum.

Í uppskoti landsstýrisins á fíggjarlógini fyri 1998 verða undir § 5 Fiskivinna avsettar 40,0 mió. kr. sum stuðul til fiskiskipaflotan.

Ætlan landsstýrismanna er at veita ein endurnýggingarstuðul yvir ávist áramál til bygging av nýggjum skipum og partvísar umbyggingar av verandi nýggjum skipum, har tað við vissu kann verða staðfest, at avvarðandi skip hevur ein møguleika at bera seg í eini langtíðarætlan, og at ein slíkur stuðul verður veittur sum ein differentieraður íløgustuðul, soleiðis at tann rentuberandi skuldin verður á einum stoði, sum samsvarar rakstrarúrslitinum. Ætlanin í hesum sambandi er, at umsøkjarin skal prógva eitt rakstrargrundalag, har umsetilig veiðirattindi og meirvirking um borð saman við betri samstarvsskipan millum veiði-, virkis- og sølulið ger, at skipum verður veitt eitt burðardygt rakstrargrundalag.

Eisini er ætlanin, at tey nýggjastu skipini skulu verða við í hesi umlegging við einum íløgustuðli í t.d. 3 ár aftrat.

Haraftrat kemur, at veittur verður ein uppheggingarstuðul til tey skip, har eigarin ynskir at leggja veiðiloyvi saman sambært § 8 í lógini um vinnuligan fiskiskap.

Fyri at náa hesum málum er ætlanin at broyta verandi lógir um endurnýggjan av skiparflotanum og lógina um íløgustuðul soleiðis, at hesar ætlanir kunnu fremjast í hesi tingsetu.

Ætlan landsstýrismanna er í hesum sambandi, at tær 40 mió. kr., sum eru í uppskoti á fíggjarlógini fyri 1998, verða settar sum stovnsfæ í ein slíkan grunn, sum kemur at virka frá 1. januar 1998. Fleiri inntøkur skulu

koma til grunnin sum avgjøld av allari fiskiveiði frá føroyskum skipum.

Vísandi til frágreiðingina frá endurskoðanarnevndini um støðuna í veiðiflotanum og ætlan landsstýrismanna í hesum máli verður við hesum biðið um, at løgtingið tekur upp eitt ordaskifti um hetta mál.

101-4 Frágreiðing frá Ivan Johannesen,

Álit

frá nevndini, ið landsstýrið setti hin 16. juli 1996 at kanna og gera tilmæli viðvíkjandi stuðulslóggávu og fígging annars í sambandi við skipabyggingar.

Tórshavn, hin 28. mai 1997

Kaj P. Mortensen (form) **Olaf Olsen**

Jens Kárl Vilhelm **Wilbelm Petersen**

Bjarni Askham-Magnussen **Heðin Weihe, skrivari**

1. Inngangur, forsøga og nevndararbeiði

Landsstýrið setti hin 16. juli 1996 eina nevnd at kanna og gera tilmæli viðvíkjandi stuðulslóggávu og fíggiing annars í sambandi við skipabyggingar.

Arbeiðssetningur nevndarinnar er at lýsa:

Verandi stuðulsskipanir í sambandi við bygging og umbygging av skipum í Føroyum.

Stuðulsskipanir í øðrum londum, herundir serstakliga í Noreg og ES.

Millumtjóða bindingar í sambandi við veitan av stuðli í handilssáttmálum við ES og innan OECD.

Tørvin at gera íløgur og viðlíkahald av fiskiskipum og í hesum sambandi at lýsa tørvin at veita almennan stuðul.

Samfelagsligur og vinmuligur týdningur av, at stuðul verður veittur til skipabygging.

Grundarlag fyri at seta á stovn ein sáttmálaveðhaldsgrunn ella aðra trygdarskipan í sambandi við skipabygging (sáttmálaveðhald).

Fíggingarmøguleikar.

Nevndin skuldi við støði í omanfyri nevnda málsetningi lata landsstýrinum:

Uppskot um nýggja stuðulslóggávu.

Uppskot um umsitingarligar reglur.

Nevndin er undir viðgerðini vorðin samd um, at tað ber ikki til at gera eina nýggja stuðulslóggávu og umsitingarreglur, fyrrenn ein støða er tikin í málinum, sum gevur eina greiða ábending, hvør tann politiski

málsetningurin verður og hvørjum karmum ein nýggj fóggáva skal virka eftir. Nevndin hevur tí í hesum álitti víst á møguleikar fyri eini nýggjari skipan og er til reiðar at gera tanu fyrireikandi lógarpartin og ansitingarligar reglur lidnar, tá ið álitið hevur verið viðgjort, og ein politisk kós er sett.

Nevndin varð soleiðis samansett:

Kaj P. Mortensen, umboð fyri Fiskivinnudeild landsstýrisins og formaður í nevndini
Olaf Olsen, umboð fyri Føroya Reiðarafelag
Wilhelm Petersen, umboð fyri figgingarstovnarnar
Jens Kári Vilhelm, umboð fyri skipasmiðjurnar
Bjarni Askham Magnussen, umboð fyri Búskapardeild landsstýrisins
Heðin Weihe, skrivari nevndarinnar

Nevndin fór undir arbeiði sítt hin 5. september 1990 og hevur havt **16 fundir.**

Tað var nevndini beinanvegin greitt, at ov lítið av bagtølum vóru um stoðuna hjá skipaflotanum. Eitt arbeiði, sum fyrr hevði verið tókt, men sum má ikki hevur verið gjørt í nakrar ár. Roynt varð at útvega tilfar, men hetta var ikki gjørligt í rímuligari tíð. Nevndin hevur tí sjálv savnað tilfar um stoðuna hjá føroyskum skipum út frá fyriliggjandi rokniskapum, sum fingust til vega frá skrásetingini og frá reiðarium. Roknskapargrundarlagið er 1994, 1995 og 1996.

Nevndin hevur gjørt nógv burturúr spurningunum um tørvin at gera flogur í føroyska skipaflotan og í tí sambandi roynt at finna fram til, um landsstýrið skal leggja seg eftir at skapa fortreytir fyri, at serstakir bólkar av flotanum fáa høvi at endurnýggja seg.
Her er nevndin samd um, at størstu møguleikarnir í dag eru fyri tey skip, sum veiða uppsjóvar fiskasløg sum síld, svartkjaft, lodnu og makrel.

Nevndin hevur hugt eftir verandi stuðulsløggávu í Føroyum og uttanlands, og verður í hesi frágreiðing komið inn á verandi skipanir.

Somuleiðis hevur nevndin hugt eftir stuðulsløggávu í okkara grannalondum, serstakliga Danmark, Noreg og ES, og hvussu hesin stuðul verður veittur. Vert er at leggja til merkis, at stuðul verður veittur til skipasmiðjur í Noreg beinleiðis, tó verður ikki sami stuðul veittur fyri fiskiskip og handilsskip. Tá talan er um at byggja fiskiskip til útflutnings er stuðulin væl minni.

Flestu londini í Evropa lata stuðul til skipabygging, sum kemur frá londunum sjálvum (statsstuðul).

Nevndin hevur havt fund við serkonar í handilsmálum viðvíkjandi stuðulsløggávumi til skipabygging, og eru upplýsingar eisini fingnar til vega úr frágreiðingum, sum fyrr eru latnar landsstýrinum.

Nevndin hevur havt fundir við landsstýrismenninar Ivan Johannesen og John Petersen fyri at fáa nærri greiða á, um nevndin skuldi leggja seg eftir einari framtíðar stuðulsløggávu, har dentur verður lagdur á at endurnýggja skipaflotan og harvið skapa arbeiðspláss í Føroyum, ella um stuðul skuldi veitast á sama hátt, um hygt verður í útlandinum. Nevndin umrøddi eisini spurningin um, hvussu áhugi kann skapast fyri at gera flogur í skip og skipabygging.

Nevndin fekk eina greiða ábending um, at ein fyrimunur eigur at vera í at byggja skip í Føroyum fyri harvið at skapa møguleika fyri arbeiði og menning. At ein ávísur stuðul eigur at liggja inni sum stuðningsláni á sama støði, sum er vanligt í øðrum londum og at tað skal loysa seg at skifta skipini út. Í hesum kom tað hugskot fram, at eitt nærri ásett gjald ella ávís upphædd (1 kr/tons), kundi verða krevt av allari veiði, sum er fiskað av føroyskum skipum, til endurnýggjan av skipaflotanum.

2. Viðmerkingar nevndarinnar

Sum heild vísa útrokningar, at raksturin undir verandi fortreytum megnar ikki at tíggju meir enn umleið 40% av nývirðinum av viðkomandi skipi.

Sum dømini sýna, er raksturin hjá teimum ymisku skipabólkunum soleiðis, at tað er torført at vísa á, hvussu nýggj skip kunnu bera ein rakstur, har kapitalútreiðslurnar skulu forrenta eini 80 til 90 % av fløgunum. Hóast skipini eru gomul og krevja stórar viðlíkahaldsútreiðslur, er ikki sannlíkt, at nýggj fiskifør vildu verið so nógv effektivari, at tey høvdu megnað raksturin. Hetta ger seg serstakliga galdandi fyri **beimaflotan**, sum veiðir botnfisk.

Hesin parturin av flotanum er samstundis tann elsti, og størsta tørvin at endurnýggja seg, um mett verður, at henda veiða skal halda fram. Fyri partar av flotanum er galdandi, at um veiðan varð virkað meira um borð, hevði tað bøtt um rakstrarúrslitið. Tó kann ikki roknast við, at tey flakaskip, sum eru í flotanum í dag, vildu komið undir Føroyar at fiska, um teir fingu tað í boðið.

Tað er ein sannroynd, at rentabiliteturin í fiskiskipaflotanum er ov lítil, m.a. orsakað av ov høgum kapitalkostnaði. Hýrukostnaðurin í Føroyum samanborið við okkara grannalond er høgur í fiskiflotanum. Hesi elva ikki til endurnýggjan av fiskiskipaflotanum.

Politiskt má støða verða tikin til, hvørt tey umleið 100.000 tonsini av botnfiski undir Føroyum hava so stóran landsbúskaparligan týdning, at serlig tiltøk skulu setast í verk, fyri at henda vinna kann hava møguleika fyri at endurnýggja seg.

Mett verður, at 100.000 tons av botnsfiski undan Føroyum hevur eitt avreiðingarvirði uppá umleið 700 mió. kr. Tá ið hesin fiskur verður keyptur av teimum, sum skulu eta hann, umboðar hann eitt fleirfalda virði.

Tað, sum hendir við fiskinum, er,
at hann partvíst verður virkaður í Føroyum,
at hann verður fluttur til útlond, tí føroyingar nýta naestan einki sjálvir,
at hann verður seldur til virki, sum virka hann til vøru at eta,
og at hann verður seldur teimum, sum eta hann.

Frá at verða fiskaður til hann er komin til forbrúkaran, verður hann umsettur handilsliga kanska ofturi, enn framleiðslu- og flutningsliðini eru.

Um føroyingar sleppa fiskinum, tá ið hann fer uppá land úr fiskifarinum, fæst einki meirvirði til føroyska samfelagið.

Verður fiskurin virkaður ávegis í Føroyum, fæst nakað meira. Verður hann útfluttur á føroyskum kjøli, fæst nakað afturat. Verður hann fullvirkaður í Føroyum ella av føroyskum fyritøkum, fæst uppaftur nakað afturat, og verður hann síðani seldur brúkaranum um føroyskt sølulið, fæst mest til føroyska samfelagið.

Til tess at hetta kann gerast, mugu fortreytirnar vera soleiðis, at tað er positivt avkast hjá øllum liðum. Tað er tað valla í dag.

Tær fortreytir, sum kunnu broytast, eru
at arbeiðsmarknaðurin lækkar sínar útreiðslur,
at vinnan gerst so liberal sum gjørligt,
at myndugleikarnir eru við til at lækka útreiðslustøðið, t.d. við eini FAS-líknandi skipan,
at t.d. fløgustuðul verður veittur.

Eitt av nesum tiltokum er tó ikki nóg mikið til at fáa lønsemi í rakstrinum, men ein royndi at fáa fleiri av hesum faktorum og øðrum við, kundi helst havt ta ávirkan, at ein stórri partur av virðisøkinginí kom til føroyska samfelagið.

Ein annar møguleiki er at leggja framleiðsluna um borð og verður tá møguleiki fyri stórri gagnnýtslu av fiskasløgunum og ein minni framleiðslukostnaður, men tað eigur at vera tikið við, at framleiðsla um borð sum frysting v.m. hevur við sær broytingar í sáttmálaviðurskiftunum.

Alment kann viðmerkjast, at fiskiskapur og fiskaidnaður eru ikki hávirðisvinnur samanbornar við nógvar aðrar. Tí er torført at kappast á einum øki við høgum kostnaðarstøði við vinnur við lægri kostnaði. Nevndin kann vísa á, at londini kringum okkum stríðast við at halda uppá síni arbeiðspláss, bóast teir hava ein munandi sterkari búskap enn vit. Ein lækking av kostnaðarstøðinum ger størsta munin til at fremja fløguhug og harvið hetra um tann samlaða búskapin.

Um ikki ein broyting fer fram her, er ikki hugsandi, at skip verða bygd í Føroyum í ávísan mun ella aðranstaðni til føroysku fiskivinnuna.

Tálan kann eisini verða um, at stuðlin, sum verður latin til nýbygging, eisini í ávísan mun ella sum heild kundi verið latin til endurnýggjan av verandi skipaflota við nýggjari innflutt skip.

Tann stuðul, sum skal veitast til skipabygging, skal játtast av løgtingsins fíggjarlóg. Játtanir á fíggjarlóginni eru bert galdandi í eitt ár. Verður játtan givin yvir fleiri ár, krevur hetta serstaka átekning á fíggjarlógini.

Nýggja játtanarskipanin hevur fimm játtanarsløg:

Rakstrarjáttan
Lógarbundin játtan
Landsfyritøka
Løgujáttan
Onnur játtan

Stuðul til skipabygging verður antin veittur við lógarbundnari ella sum "onnur" játtan. Munurin millum hesi bæði játtanarsløgini er, at tann lógarbundna játtanin verður nýtt, tá ein ávísur bólkur í samfelagnum hevur rætt til eina ávísa upphædd ásett í lóg, t.d. verða fólkapensión og onnur játtan oftast nýtt, tá ið ein ikki hevur ásett í lógini ein ávísan bólk av borgarum ella fyritøkum, men at ávísar treytir ásettar í kunngerð ella á sjálvari fíggjarlógini skulu vera fylgdar, t.d. stuðul til nýggjar vinnur. Tá játtanin er uppbrúkt, kann ikki meira veitast í stuðli, hóast ein kemur undir treytirnar.

Veðhaldsskipanir eru ikki í tráð við játtanarskipanina, tí ger leggja bindingar á landsskassan í framtíðini. Játtan verður bert givin fyri eitt ár, og verður játtanin ikki nýtt, skal hon afturførast til landskassan.

Í sambond við stuðulsloggávu verður mett til at nýta lógarbundna játtan. Tað tryggjar borgaran og noyðir teir politisku myndugleikarnar at endurskoða lógina ár undan ári.

3. Tilmæli nevndarinnar.

Nýbygging

Mælt verður til at verandi **rentustuðulin** uppá 12 % verður vanlveittur og goldin yvir 5 ár. Hetta svarar til í mesta lagi til eitt nútíðarvirði (NV) uppá 10 %.

Ístaðin fyri at veita studningsláu uppá 10 % og landskassaveðhald upp til 15 %, verður mælt til, at ein **fløgustuðul** uppá 15 % verður veittur.

Rentustuðulin, NV uppá 10 %, og ein generellur íløgustuðul uppá 15 % saman við 10 % eginfíggingi, muna tá bert at fáa kapitalkostnaðin nakað niður við tað, at rentuberandi skuldin tá verður minkað úr 70 % niður í 65 %. Hetta svarar til eina øking av studningsláninum uppá 5 % og at landskassaveðhaldið fellur burtur. Ivasamt er um peningastovnarnir, við núverandi skipan, vilja veita frestandi fíggingina millum 50 % og upp til 70 %, hóast landskassaveðhald. Enn minni sannlíkt er, at peningastovnarnir kunna at veita 2. veðrættarfígging upp til 65 % uttan fiskoytisábyrgdir.

Vísandi til part 5 "*Íløgutørvur grundaður á støðið undir verandi skipaflota*" er rentabiliteturin ymiskur fyri teir ymisku skipabólkarnar, og verður tí skotið upp at hava møguleikan fyri at veita ein **differentieraðan fiskoytisíløgustuðul** við atliti til eina samfelags búskaparliga optimering og treytaðan av, at eginfíggingin verður økt við tí endamáli, at rentuberandi fíggingin gerst munandi minni og tí meira sannlík at fáa til vega.

Ein differentieraður fiskoytisíløgustuðul kann verða skipaður á tann hátt, at ein ávísur skipabólkur fær ein fiskoytisíløgustuðul alturat 15 % íløgustuðulinum, og sum stendur í mun til eina øking av eginfíggingini. Dømi um slíkan fiskoytisíløgustuðul kann verða 5 %, um eginfíggingin økist úr 10 % upp í 20 %. Fyri ein annan skipabólk kann fiskoytisíløgustuðulin verða 7,5 % við somu øking av eginfíggingini o.s.v.

Hetta hevur við sær, at rentuberandi skuldin verður 50 % ella minni við eini eginfígging uppá 20 % móti 65 % í rentuberandi skuld við eini eginfígging uppá 10 %.

Á niðanfyri standandi strikumynd sæst, hvussu nevndin hugsar sær, at ein differentieraður íløgustuðul kann verða skipaður eftir skipabólkum. Tá skotið verður upp at differentiera eftir skipabólki, er hetta knýtt at rentabilitetinum fyri teir ymisku skipabólkarnar. Eisini kann hendta differentiering verða eitt amboð til at samanseta enduroyggingina av fiskiflotanum. Ein tílík íløguskipan kemur eisini at eggja til, at eginfíggingin verður rinniliga stórur partur av samlaðu fíggingini.

Útvegan av nýggjari brúktum skipum.

Mælt verður til, at avmarkaður stuðul verður veittur til innflutning av nýggjari brúktum skipum, sum ikki eru eldri enn 5 ár. Umbygging í Føroyum kann roknast við sum grundarlag fyri veitan av stuðli.

Íløgufeløg.

Ásannandi, at torført kann verða hjá verandi reiðaríum og einstaklingum at útvega nøktandi eginfígging (20 %), verður skotið upp, at stig verða tikin til, at Føroya Landsstýri, peningastovnarnir og Tryggingarsambandið Føroyar, seta á stovn eitt íløgufelag, hvar eisini privatir íleggjarar kunnu skjóta inn pening, til tess at luttaka við avmarkaðari eginfígging saman við verandi reiðaríum og einstaklingum. Víst verður eisini til part 4.2.2. um venture-feløg.


Rentabilitetur.

Sum tað framgongur av yvirlitinum í parti 5 "*Íløgutørvur grundaður á støðið undir verandi skipaflota*" er neyðugt við munagóðum rentu- og íløgustuðli og eginfígging.

Til tess at fáa betur rentabilitet í fiskiskipaflotan, verður mælt til:

umsetilig fiskirættindi
liberaliserling av virkisøkinum hjá veiðuliðnum
tættari samstarv millum veiðulið, framleiðslulið og sølu

Differentiering av íløgustuðli
í mun til eginfígging og skipabólk



4. týdningur fyri samfelagið av almennum stuðli til skipabygging

Í Føroyum hevur tað almenna í 70'unum og 80'unum stuðlað skipabygging. Stuðulin hevur verið givin fyri at stuðla føroysk arbeiðspláss m.a. skipasmiðjuídnaðin. Skiftandi landsstýri hava havt skipapakkar, ið høvdu við sær, at fleiri nýggj skip komu í føroyska flotan.

Stuðulin til skipakeyp og rakstur av fiskivinnuni vaks, samstundis sum møguleikarnir hjá tí føroyska flotanum á fjarleiðunum vórðu skertir. Stuðulin hevur sostatt virkað sum bjargingarbelti hjá tí føroyska flotanum og hevur tryggjað, at góð skip framvegis eru í flotanum.

Fíggjarkreppan í Føroyum, í kjalarvørrinum av "skipapakkunum" í 80'unum, minkandi veiðimøguleikum og vaksandi kapping í farmasigling, hava broytt hugburðin soleiðis, at burðadygg fiskivinna og betri kappingarevnir eru vorðin eitt politiskt krav. Trupulleikin í dag er, at fleiri av teimum nýggju skipunum eru farin úr flotanum, meðan tey gomlu eru eftir. Politiski myndugleikin hevur tí ásannað, at neyðugt er at endurnýggja flotan. Endurnýggingin eigur eisini at skapa arbeiðspláss á landi, og tí eigur ein stuðulskipan eisini at koma føroysku skipasmiðjunum til góðar.

4.1. Samfelags týdningur av stuðli

Tá tað almenna stuðlar vinnulívinum, merkir hetta, at ein beinleiðis setir marknaðarkreftirnar til viks. Hetta verður oftast gjørt, tí ein hevur eina fatan av, at marknaðarkreftirnar ikki virka til fyrimuns fyri samfelagið.

Lønartillagingin á arbeiðsmarknaðinum er eitt dømi um, at marknaðarkreftirnar verða órógvaðar. Lønartillagingin fer fram í sáttmála partanna millum. Tað er ikki tann einstaki arbeiðstakarin og arbeiðsgevarin, sum koma ásamt um prísin fyri arbeiðið, sum arbeiðstakarin fremur.

Eitt annað dømi um skeivleikar í marknaðarkreftunum er kvotaskipan ella fiskidagaskipan. Hesar skipanir forða skipunum í at fiska tað, ið ongarsmegna.

Orsøkin til, at ein regulerar hesar marknaðir, er, at arbeiðstakararnir hava funnið saman í fakfeløg, ið teirra vegna samráðast við arbeiðsgevaran, og at kvotur ella fiskidagar eru ásettir fyri at verja fiskastovnarnar.

Í Føroyum verður ásannað, at fiskivinnan krevur ávísan stuðul. Tann vantandi rentabilitetur, sum valdar í fiskivinnuni, hevur viðført eitt politiskt trýst til at veita stuðul.

Tann vantandi rentabiliteturin hevur eisini ført við sær, at lítið og ongin avkast er í fiskivinnuni, og sostatt fær fiskiflotin útfrámt stuðul til hýrur, eisini stuðul til fløgur.

Samanlagt er hetta ein stuðul sum í 1997 er mettur at kosta landskassanum umleið 140 mió.kr.

Stuðulin fer til at varðveita arbeiðspláss, hóast arbeiðsmegin av siglandi fólki er minkað munandi síðani 1987.

Stuðulin til skipabygging í Føroyum viðførir fleiri arbeiðspláss á skipasmiðjum og nøkrum øðrum fyritøkum.

Tað almenna hevur nógvar ymiskar møguleikar at stuðla, og niðanfyri eru víst nøkur stuðulsslag, ið kunnu nýtast at stuðla við.

4.2. Stuðulsslag

4.2.1. Veðhaldsskipanir

Við veðhaldsskipan veðheldur tað almenna ella privatir fyri lánum, ið lántakari upptekur í privatum fíggjarstovnum. Ein veðhaldsskipan, sum tað almenna veitir, eigur at geva fíggjarstovninum sama

tapsvanda, sum tað almenna. Hetta tryggjar tað almenna ímóti, at figgjarstovnurin verður minni vartin í meting av tapsvanda sínum. Sum dømi kann tað almenna veðhalda við 30 % og figgjarstovnurin við 30 %.

4.2.2. Venture - feløg

Smærri og nýggj virkir hava ringt við at fáa kapital frá privatum investorum. Virkini hava tí ofta tørv á ráðgeving og leiðsluvitan, sum kann meana teirra kapital.

Hugsanin við "venturefelagi" er, at hetta felag setur pening í eina ávísa verkætlan. Venturefelagið hevur ávirkan á, hvussu verkætlanin verður framd, og er ein aktivur partur í verkætlanini. Sostatt er tað ikki bert ein yvirføring av kapitali, ið fer fram, men eisini ein yvirføring av vitan innan leiðslu, sum tað minna felagið hevur tørv á.

Lýdnast ætlanin, hevur venture-felagið rætt til vinning, svarandi til ognarpartin hjá felagnum í verkætlanini. Miseydnast ætlanin, bera bæði venture-felag og stigtakari tapið.

4.2.3. Stuðul via infrastruktur og ráðgeving

Í Føroyum hevur stuðut til infrastruktur verið nógv nýttur. Stuðulin virkar sjónligur, bæði hjá vinnulívi og borgarum.

Stuðulin kann eisini geva avleiddar virkningar til vinnulívið, hóast hetta ikki er prógvað.

Stuðul til ráðgeving kenna vit í Føroyum gjøgnum Meningarstovuna, Meaningar- og Ídnaðargrunnin og nú til várs TK-støð.

Ávirkanin av tílíkum stuðli er oftast ring at fáa eyga á, tí hon ikki virkar beinleiðis. Tann langsiktaða ávirkanin av stuðlinum er oftast betri vitan hjá vinnulívinum.

4.2.4. Stuðul við treytaðum lánum og stuðli

Treytað lán eru lán, ið bert verða endurrindað, um verkætlanin verður væleydnað. Endurrindanin kann fara fram sum við vanligum lánum, ella sum partur av ágóðanum av verkætlanini. Ætlanin við tílíkum lánum er, at verkætlanir, sum eru ivasamar, kunna verða settar í verk. Stuðul kann eisini veitast sum rættindi til partabrøv í virkinum.

5. Íløgutørvur grundaður á støðið undir verandi skipaflota.

Hesin partur viðger støðuna hjá verandi skipaflota. Bólkingin, ið nýtt verður er: djúpvatnstrolarar, ídnaðartrolarar, ísfiskatrolarar, línuskip, nóta- og trolskip, rækjutrolarar og verksmiðjutrolarar. Til seinast verður dømi um farmaskip eisini tikið við.

Nevndin hevur valt nøkur skip út fyri hvønn bólk fyri at lýsa rakstrargrundarlagið hjá teimum ymisku bólkunum. Rakstrarútreiðslitið, ið nýtt verður her, er úrslit av primerum rakstri og allur stuðul frádrigin. Stuðul, ið her kann verða talan um, er íløgustuðul og inntøkuføring av studningslátti. Tað hevur verið roynt at lýsa gongdina við trimum rokniskaparárum, 1994, 1995 og 1996. Tað hevur ikki í øllum førum hepnast at fingið hendur á øllum tølum, hetta tí at skipið ikki hevur verið í drift í árinum, ella at tølini fyri 1996 ikki fyriliggja enn.

Upphæddir í fylgjandi talvum eru úrslit tøk til kapitalkostnað.

5.1. Djúpvatnstrolarar

Djúpvatnstrolarar eru 7 í tali og miðalaldurin í hesum bólki er 18,2 ár.

Djúpvatnstogarar.	1994	1995	1996	Miðal
1	629.678	953.443	1.450.000	1.011.040
2	2.624.409	3.370.000	2.665.397	2.886.602
3	1.835.000	2.152.000	1.294.000	1.760.333
4	2.326.000	1.965.583	961.797	1.751.127
5	(261.000)	(401.900)	3.523.185	953.428

5.2. Ídnaðartrolarar

Ídnaðartrolarar hava tey seinastu árini havt nøkur torfør ár. Hetta orsakað av, at teirra veigumøguleikar eru nógv skerdir tey seinastu árini. Ídnaðartrolararnir eru 8 í tali og miðalaldurin fyri hesar er 31,16 ár. Sum sæst á talvuni, so ber raksturin ikki lann stóra kapitalkostnaðin. Nú er henda veiðan steðgað í Føroyum

Ídnaðartrolarar	1994	1995	1996	Miðal
1	48.489	(215.305)		(83.408)
2	721.915	(140.794)	219.828	266.983

5.3. Ísfiskatrolarar

Ísfiskatrolarar er bólkurin við flestu skipunum. Í hesi gjøgnumgongd er bólkurin býttur upp í ísfiskatrolarar, trolbátar undantiknir, ið fiska einsamallir, og partrolarar. Samlaða talið av skipum í hesum bólki er 44. Miðalaldurin er 21,56 ár. Hesin bólkur er høvuðsrávøruteverandørur til flakavinnuna á landi. Sum tað framgongur av niðanfyristandandi talvu, er torført hjá hesum skipum at klára støvegis av kapitalkostnaði. Tleir nýggjaru bátarnir síggja út til at klára seg heldur fragari, helst av tí, at raksturin er lættari á nýggjari skipum.

Ísfiskatrolarar	1994	1995	1996	Miðal
1	(635.000)	(655.915)		(645.458)
2	1.501.000	1.106.052		1.303.526
3	71.000	189.822		130.411
4	1.035.000	1.829.923		1.432.462
5	909.000	1.923.662	1.671.674	1.501.445
6	1.968.215	2.532.871	2.203.000	2.234.695
7	1.981.000	1.341.051	2.478.296	1.933.449
8	312.083	467.510	165.000	314.606
9	1.842.000	1.811.000	2.345.000	2.009.000
10	1.102.000	523.211		812.606

Ísfiskatrolarar/pør	1994	1995	1996	Miðal
1	226.135	(192.100)		17.018
2	(835.000)	1.162.000	373.000	233.333
3	(1.659.000)	(140.000)	(20.000)	(606.333)
4	462.000	2.063.000	(1.466.000)	353.000
5	(1.175.000)	(70.000)	713.000	(177.333)
6	913.328	571.376	1.039.000	812.606

5.4. Slálínuskip og línubátar

Niðanfyristandandi talvur vísa raksturin hjá bólkinum línuskip. Hesin bólkur er uppbýttur í línu-snellubátar, línubátar og línuskip. Tal og aldur á hesum bólkum er ávikavist 9 og 44,5 ár, 40 og 38,8 ár, 13 og 30,42 ár. Hesin samlaði bólkur er eisini ein týðandi leverandørur av ráfiski til flakavinnuna á landi.

Línu- og snellubátar	1994	1995	1996	Miðal
1	37.597	(47.785)	(62.556)	(24.248)
2	41.000	185.368		113.184
3	224.544	102.778		163.661

Línuskip	1994	1995	1996	Miðal
1	639.493	1.022.603	1.016.033	892.710
2	947.000	601.825		774.413
3	123.599	506.146	1.019.475	549.740
4	(264.429)	447.744		91.658
5	1.230.575	997.566		1.114.071
6	(52.000)	(196.264)		(124.132)
7		104.543		52.272
8	1.127.939	42.462		585.201

5.5. Nóta- og Trolskip

Tey flestu av hesum fórum eru vorðin gomul, men útlitini fyri eitt styttri áramál tykjast tó her at vera fragari, tí tað er meira síld og makrelur uti okkara leiðir enn áðrini frammanundan. Um byggjast skal nýtt til hesa veiði, eru tað stórar og dýrar eindir, sum seta stór krav hæði til eginfígging og aðra.

Nóta- og trolskip eru 9 í tali og miðalaldurin er 22.35 ár. Hesin bólkur sær út tit í løtuni at klára seg.

Nóta- og Trolskip	1994	1995	1996	Miðal
1	8.039.000	14.657.368	15.966.378	12.887.582
2	653.000	1.689.367		1.171.184
3	924.000	1.934.747		1.429.374
4		5.506.495	9.591.816	7.549.156
5			1.454.194	1.454.194
6			9.493.000	9.493.000
7	493.000	4.229.782		2.361.391

5.6. Verksmiðjutrolarar

Hesi skip koma helst at klára seg fíggjarliga, so leingi vit hava ein fiskiveiðisáttmála við Noreg og Rusland á sama støði sum nú. Uni hesi skip høvdu roynt undir Føroyum og virka fiskin uni borð, bevði raksturin ikki bingið saman.

Hesin bólkur fevnir um 6 skip, og er miðalalduriu á hesum 12,16 ár. Hesin siest á niðan- fyristandandi talvu klára hesi skipini seg hampuliga vel.

Verksmiðjutrolarar	1994	1995	1996	Miðal
1	20.135.331	15.774.513	14.977.787	16.962.544
2	11.813.000	11.869.458	8.257.264	10.646.574
3			13.218.000	13.218.000
4			13.148.000	13.148.000

5.7. Frystitrolarar

Tað eru bert 2 skip í hesum bólki, og tey hava bert fiskað í 2 ár, men tey eru rættiliga gomul, umleið 23 ár. Hesi skip hava undantaksloyvi at virka fisk umborð.

Frystitrolarar	1994	1995	1996	Miðal
1		1.107.207	644.896	876.052
2		-393.905	1.387.607	496.851

5.8. Rækjuskip

Hesin parturin av veiðiflotanum hevur yvirhøvur verið góður og effektivur, men nøkur av teimum bestu førunum eru farin úr flotanum, og tey, sum eftir eru, fara at eldast. Henda veiðan hevur verið eitt gott fiskoyti til føroyska búskapin, og enn eru ávísir møguleikar at troyta. Tó hava føroyingar ikki atgongd til tær bestu fiskileiðirnar, og hava tí ikki sama møguleika at forrenta tey kostnaðarmiklu skip, sum hesi eru, í sama mun sum grannar okkara.

Rækjutrolarar eru 11 í tali og miðaldurin er 17,8 ár.

Rækjutrolari	1994	1995	1996	Miðal
1	2.214.236	3.299.348	29.672	2.756.792
2	591.000	2.525.335		1.558.168
3	4.922.000	12.040.676		5.654.225
4	8.621.000	8.216.000		8.418.500
5	4.266.000	2.780.612	32.975	2.359.862
6		2.754.290	6.458.701	4.606.496

5.9. Djúphavs- og úthavsflotin

Fyri hesi før er torført at meta um rentabilitet, tí hetta enn er nýggj og óroynd vinna, men óivað eru møguleikar í henni, men tað krevur sterkar fíggjarligar fyritøkur til at menna hesa veiði, og tær eru fáar í Føroyum. Royndarfiskiskapur er í hesum førinum eisini kostnaðarmikil.

5.10. Handilsskip

Sum dømi er her tikið við raksturin hjá einum farmaskipi.

Farmaskip	1994	1995	1996	Miðal
1		3.481.794	3.345.848	3.413.720

5.11. Niðurstøða

Sum tað framgongur av omanfyristandandi, er miðalaldurin á flestu skipabólkum sera høgur, so ein endurnýggjan av flotanum er tiltrongd. Rentabilitetarin er tó so vánaligur, at ikki kann hugsast um, at ein endurnýggjan kann fremjast við egnari hjálp og verandi vinnumøguleikum. Sjálvt við stórum íløgustuðli verður torført hjá hesum bólkum at klára raksturin.

Spurningurin er so, hvat kann gerast, soleiðis at ein náttúrlig endurnýggjan kann fara fram, samstundis sum tað kann vera áhugavert hjá fleggjarum at gera íløgur í hesa, fyri Føroyar, so týdningarmikla vinnu.

Tað er sera týdningarmikið fyri vinnuna at vera sjálvstøðug, tvs. fíggjarliga óheft av almennum stuðli og skiftandi politiskum ráki. Almennu **myndu**leikarnir skulu haraftrat bera so í bandi, at vinnan gerst sjálvstøðug og lønandi, við at tilrættaleggja kannarnar, soleiðis at hetta gerst møguligt.

Hvat kann so gerast í hesum sambandi? Tað er ein samroynd, at 100.000 tons av botnfiski undir Føroyum, umboða eitt avreiðingarvirði á umleið 700 mió. kr. Henda uppbædd skal so býtast millum heimaflotan. Sum sæst av gjøgnumgongdini av ymisku skipabólkunum, er lítið til hvønn.

Hvussu kann hetta so broytast? Hevði meira verið til hvørja eind, hevði úrslitið sjálvandi verið betrað. Ein miðsavnan av fiskirættindum kundi farið fram við at gjørt fiskirættindini umsetilig. Hetta kenna vit eitt nú frá Íslandi. Vansin er sjálvandi, at fiskirættindini verða á fæmi hondum, og vandin fyri, at smærru økini missa fiskirættindi, er stórur. Hetta er partvís hent í Íslandi.

Verða sonn 100.000 tonsini tikin sum dømi, fara hesi igjøgnum fleiri framleiðslu- og handilslið, soleiðis at virðið er fleirfaldað í mun til avreiðingarvirðið, tá tá forbrúkarin fær vøruna. Við at leggja ein størri part av virðisøkingini av veiðuni umborð á skipini, vildi hetta í fleiri førum bøtt um rentabilitetin. Ein liberalisering á hesum øki hevði verið hóskandi. Hetta kann føra við sær, at arbeiðspláss á landi verða flutt til skipini.

Hugsast kann, at eitt tættari samstarv millum veiðulið, framleiðslulið og sølu gevur møguleika fyri neyvari stýring og tilrættalegging. Hetta tiltak er sjálvandi upp til vinnuna sjálva.

Nevndu tiltøk eru:

- Umsetilig fiskirættindi
- Liberalisering av virkisøkinum hjá veiðuliðnum
- Tættari samstarv millum veiðilið, framleiðslulið og sølu

Hesar fortreytir eiga at verða til staðar, hóast fløgustudul verður veittur til skipabygging.

Mettur íløgutørvur í nýggj fiskiskip

Eginfigging : 20,0% (Fíggjaði sambart uppskoti um generellan íløgustuðul)

	(x Kr. 1.000)	Nettosáttmáli		Rentust. (NV)	Íløgustuðul		Samlaður stuðul		Kapitalkostn. 0-5 ár við		Tøkt til kap. frá rakstri	Margin	
					Bólkur A	Bólkur E	Min.stuðul	Max.stuðul	Min.stuðul	Max.stuðul			
	Skipaslag:	hvørt	tils.	10,0%	20,0%	30,0%	30,0%	40,0%	5,5%	4,4%		Min. st.	Max. st.
2	Nóta- & Trolskip	100.000	200.000	20.000	40.000	60000	60.000	80.000	5.500	4.400	6.500	15,4%	32,3%
1	Rækjutrolari	90.000	90.000	9.000	18.000	27000	27.000	36.000	4.950	3.960	5.200	4,8%	23,8%
1	Flakatrolari	130.000	130.000	13.000	26.000	39000	39.000	52.000	7.150	5.720	10.000	28,5%	42,8%
1	Djúpvatnstrolari	56.000	56.000	5.600	11.200	16800	16.800	22.400	3.080	2.464	2.800	-10,0%	12,0%
4	Partrolarar	35.000	140.000	14.000	28.000	42000	42.000	56.000	1.925	1.540	1.700	-13,2%	9,4%
4	Línuskip	27.500	110.000	11.000	22.000	33000	33.000	44.000	1.513	1.210	1.200	-26,0%	-0,8%
6	Útrørðarbátar	9.000	54.000	5.400	10.800	16200	16.200	21.600	495	396	400	-23,8%	1,0%
1	Farmaskip	70.000	70.000	7.000	14.000	21000	21.000	28.000	3.850	3.080	3.400	-13,2%	9,4%
	Tilsamans		850.000	85.000	170.000	255.000	255.000	340.000	46.750	37.400	45.000	-3,9%	16,9%

6. Stuðulsskipanir

Skiftandi stjórnir í flestu londum hava kent seg noyddar at stuðla vinnuni við almennum peningi. Talan kann sigast at vera um búskaparlig og sosial atlit, tá ið studningur er veittur skipasmiðji, soleiðis at skilja, at ikki eru bert nógv arbeiðspláss beinleiðis ella óbeinleiðis knýtt at skipasmiðjufdnaðinum, men skuldi bygging av skipum eisini ført við sær, at t.d. fiskiskipaflotin verður endurnýggjaður og harvið eisini ført við sær eina effektivari framleiðslu.

Niðantýri eru fyrst sett upp verandi skipan í Føroyum. Síðani eru skipanirnar í Danmark, Noregi og ES valdar út til samanberingar.

6.1. Verandi stuðulsskipan í Føroyum.

Hóast eingin skipabygging av týdningi hevur verið síðani 1991, eru flestu lógirnar frá áttitiárunum, sum viðvíkja skipasmíð, framvegis í gildi. Tað kann eisini viðmerkjast, at hóast lógirnar hava verið í gildi, hava tær ikki havt møguleika at virka eftir sínum innihaldi, tí eingin peningur hevur verið settur av á fíggjarlógini seinastu árini.

- Lógirnar og tilhoyrandi kunngerðirnar eru:

- Løgtingslóg nr. 38 frá 20. mai 1988 um bygging av fiskiførum til útflutnings, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 83 frá 13. juni 1995

- Løgtingslóg nr. 102 frá 19. august 1988 um endurnýgging av fiskiskipaflotanum, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 83 frá 13. juni 1995.

- Løgtingslóg nr. 83 frá 19. juni 1990 um stuðul til bygging av farmaskipum, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 83 frá 13. juni 1995

- Løgtingslóg nr. 85 frá 9. juni 1988 um sáttmálaeftirlit

- Kunngerð nr. 81 frá 8. august 1988 um rentustudning til bygging av fiskiskipum

- Kunngerð nr. 44 frá 11. mai 1989 um eginpening.

- Hareomfrant er løgtingslóg nr. 73 frá 20. mai 1996 um studning til skipasmiðjur, ið bert viðvíkur endurrindan av farmagjaldsútreiðslum og innflutningsgjøldum.

Aftast í álitinum undir fylgiskjali 4 er gjørt eitt yvirlit yvir stuðulsmøguleikar í verandi stuðulskiggáru.

Niðanfyri eru sett upp dømi, ið lýsa stuðulsmøguleikarnar, um so er, at omanfyri nevndu lógir verða nýttar fult út.

Dømi

		Fiskiskip bygt til		Farmaskip bygt til		Umbygging
1000 kr.		**Før. reiðarí**	**Útl. reiðarí**	**Før. reiðarí**	**Útl. reiðarí**	**> 3,0 mill.**
Byggikostnaður	**100%**	**50.000**	**50.000**	**50.000**	**50.000**	**8.000**
Tollendurgjald	3,5%	1.750	1.750	1.750	1.750	280
Farmaendurgjald	4,5%	2.250	2.250	2.250	2.250	360
Skipasmiðja netto	8,0%	46.000	46.000	46.000	46.000	7.360
Rentustuðul 1)	12,0%	4.800	4.800	4.800	4.800	
Studningsláu 2)	10,0%	5.000		5.000		
Maskinur o.a. 3)	15,0%					2.400
Eykastudningur	0,0%					
Beinleiðis stuðul tils.		13.800	8.800	13.800	8.800	3.040
Veðhald fyri lánum	15,0%	0				
Stuðul og veðhald tilsamans		**13.800**	**8.800**	**13.800**	**8.800**	**3.040**
Eginpeningur	10%	5.000	5.000	5.000	5.000	800
Beinl. stuðul, íroknað stuðulslán		13.800	8.800	13.800	8.800	3.040
Onnur fremmand fígging		31.200	36.200	31.200	36.200	4.160
Rentuberandi fígging		36.200	36.200	36.200	36.200	4.160

1) Rentustuðulin uppá 12 % verður útgoldin hálvárliga yvir 5 ár. NTV er **9,6 %** við 6% diskontering.

Um umbyggingin av fiskiskipi til útlendskan reiðara er størri enn kr. 8.0 mill., kann rentustuðul latast.

Til umbygging av farmaskipum kann veitast upp til 6.0 % í rentustudningi.

2) Verður veitt sum stuðulslán, men kunt sambært løglingslóg um íløgustuðul verða lagt um til rentu- og avdráttarfrítt lán, avskrivað yvir 10 ár.

3) 30 % endurrindan av ávísum umbyggingum, t.d. útskifting av motori, spølum v.m.

6.2. Stuðulsskipanir í øðrum londum.

6.2.1. Noreg.

Noreg hevur sum fylgja av EBS verið noytt at laga seg til galdandi ES reglur.
Norska stuðulsskipanin til skipabygging (handilsskip) umfatar nýbygningar uppá minst 100 GT og munandi umbyggingar uppá minst 1000 GT.

Fylgjandi stuðul verður veitur til bygging av skipum á norskum skipasmiðjum:

- Nýbygningar við einum sáttmálavirði uppá minst 10 mió. ECU: 9 %
- Nýbygningar við einum sáttmálavirði undir 10 mió. ECU: 4,5 %
- Munandi umbyggingar: 4,5 %

Skipanin umfatar eisini bygging av fiskiførum til útflutnings.

Viðmerkjast skal, at fyri bygging og umbygging av fiskiskipum, sum hava fiskirættindi í norskum sjóøki, eru serligar reglur um stuðul galdandi. Hesar reglur umsitur Statens Fiskerbank.

6.2.2. Danmark.

1. Rentustuðulsskipanin.

Rentustuðulsskipanin til at minka um fíggingarinnreiðslurnar í sambandi við bygging av skipum á donskum skipasmiðjum varð gjørd við eini politiskari semju í august 1993. Skipanin avloysir indeksfíggingarskipanina, har danski staturin tryggjaði reiðarunum at gjalda munin millum eina hámarks indeksering, sum reiðarin rindar, og ta veruligu indekseringina á indeksobligatiónunum hjá Danmarkar Skipskreditgrunni. Skipanin er góðkend av ES-nevndini sambært tí 7. Skipasmiðjudirektivinum, og er longd til árslok 1997.

Við tað at skipanin inniheldur ein beinleiðis stuðul, vil hon detta burtur, tá tann nýggi OECD-sáttmálin kemur í gildi.

Endamálið við rentustuðulsskipanini er at tryggja donskum skipasmiðjum somu kappingartreytir sum skipasmiðjur í øðrum londum hava. Skipanin umfatar bert reiðarar, sum lata skip byggja á donskum skipasmiðjum.

Nýggjar ilsagnir um rentustuðul kunnu latast til byggisáttmálar, sum eru gjørdir áðrenn árslok 1997. Stuðulin kann veitast sum ein upphædd útgoldin, tá skipið er latið eigaranum (útrokna nútíðarvirði), ella í ratum, so leingi sum lánitíðin er, tvs. í upp til 14 ár.

Rentustuðulin svarar til 9 % av sáttmálavirðinum. Rentustuðulin verður minkaður til 8 % um so er, at reiðarfið søkir um endurtrygging íggjøgnum "Garantifonden for Skibsbygning". Fyri minni skip við einum sáttmálavirði uppá undir 10 mió. ECU, verður veitt í rentustuðli 4,5 % av sáttmálavirðinum.

2. Tryggingargrunnurin fyri Skipabygging ("Garantifonden for Skibsbygning").

Talan er um ein almennan danskan grunn, ið veitir peningastovnum og tryggingarfeløgum endurtryggingar í sambandi við skipabygging.

Peningastovnar og tryggingarfeløg kunnu veita økta trygd fyri lánum til skipabygging. Tann veitta trygdin er fyri tí partinum av lánunum, sum liggur millum 1. veðrætt hjá Danmarkar Skipskreditgrunni (max. 60 % av sáttmálaprísinum) og tað samlaða lánið (max. 80 % av sáttmálaprísinum).

Tann av peningastovnunum ella tryggingarfelagnum veitta trygd kann síðani endurtryggjast í hesum grunni við 80 % av tí veittu trygdini, tvs. at tey frestandi 20 % átaka peningastovnar ella tryggingfeløg sær ábyrgdina av.

3. Serligar danskar skipanir viðvikjandi fiskiskipum.

Í Danmark eru fleiri serligar skipanir galdandi fyri fiskivinnuna, herundir fiskiskip.

Nevnast kunnu:


- upphøggingarstuðul
- endurnýgging av fiskiskipaflotanum
- stuðul til royndarfiskiskap

Víst verður annars til fylgjaskal 6.

6.2.3. ES.

Stuðul til bygging av handilsskipum innan ES-londini er hin sami sum nevnt undir partinum viðvíkjandi Noregi. Tó skal viðmerkjast, at innanfyri ES verður gátlkið, at hægri og/ella øðrvísi stuðul verður latin til bygging og umbyggingar av fiskiskipum til egnan fiskiflota, t.d. kunnu nevnast regionalstuðlarnir, ið serliga stuðla økjum í einum limalandi, sum eru nógv knýtt at fiskivinnuni.

6.3 Fíggingarmøguleikar



6.3.1. Verandi fíggingarmynstur:

Á myndini til vinstru er víst, hvussu eitt vanligt fíggjarmynstur fyri eitt fiskiskip vildi sæð út, um galdandi lógarheimildir vóru nýttar.

Minstakravið til eginpening er 10 % av sáttmálaupphæddini.

Rentustuðulin uppá 12 % verður goldin reiðarínum yvir 5 ár og verður vanliga til-transporteraður peningastovni. Um hesin verður diskonteraður, er nútíðarvirðið av rentustuðlinum (NV) hægst 10 %.

Studulslánið umlagt til studningsslán uppá 10 % er rentu- og avdráttarfrítt og skal niðurskrivast yvir 10 ár. Reiðarlið skal inntøkuføra ein tíggjundapart av hesi upphædd árliga.

Tann rentuberandi skuldin verður sostatt 70 % av sáttmálaupphæddini, um eginfíggingin er 10 %.

Er eginfíggingin størri enn 10 %, verður rentuberandi skuldin tilsvarandi minni.

Harumframt hevur Føroya Landsstýri heimild at veita landskassaveðhald upp til 15 % av uttasta partinum av rentuberandi skuldini, millum 55 % og 70 %. Tapsvandin er rættuliga stórur.

Mest vanliga fíggingin, í tráð við strikumyndina til vinstru, er fingin frá Realinum við 1. veðrætti upp til 50 %. Hendan verður afturgoldin yvir 10 ár, og hevur landsstýrið vanliga lagt avdráttirnar út fyri 2 tey fyrstu árini móti einum síðustilladum 1. veðrætti. Hetta síðustillaða "avdráttarlán", sum er við til at lætta um gjaldførið fyrstu tey fyrstu árini, verður afturgoldið 11. og 12. Árið eftir, at lánið frá Realinum er upptikið.

Tey frestandi 20 %-ini eru upptikin í einum peningastovni, har landsstýrið hevur heimild at veðhalda fyri teimum uttastu 15 %-unum ella tí parti av einum 2. veðrættarláni, og partaeigararnir møguliga fyri innara/-partinum av sama láni.

Vanligt hevur eisini verið, at Danmarks Skibskreditfond hevur veitt eitt 1. veðrættarlán upp til 70 % móti ískoytis trygd frá peningastovni fyri tí partinum, ið liggur uttanfyri í mesta lagi 50 %. Peningastovnurin hevur so fingið kontratrygd við 15 % frá Føroya landsstýri og møguliga 5% frá partaeigarunum.

Eisini hava útlendskir bankar fíggjað tey 70 %-ini við 55% móti veð í skipinum og móti landskassaveðhaldi fyri uttastu 15 %-unum.

Í øllum førum hevur landsstýrið havt innkomurætt í tann veðrætt, sum landskassaveðhaldið er umfatað av.

6.3.2. Uppskot til umlegging av stuðulsláni og veðhaldi.

Mælt verður til, at verandi rentustuðulin uppá 12 % og sum verður goldin yvir 5 ár, verður vardveittur. Hetta svarar til í mesta lagi til eitt nútíðarvirði (NV) uppá 10 %.

Ístaðin fyri at veita studningslán uppá 10 % og landskassaveðhald upp til 15 %, verður skotið upp, at ein íløgustuðul uppá 15 % verður veittur.

Tað er ein samroynd, at rentabiliteturin í fiskiskipaflotanum er ov lítil, m.a. orsakað av ov høgum kapitalkostnaði.

Rentustuðulin, NV 10 %, og ein generellur íløgustuðul uppá 15 % saman við 10 % eginfígging, muna bert at fáa kapitalkostnaðin nakað niður, við tað at rentuberandi skuldin tá verður minkað úr 70 % niður í 65 %. Hetta svarar til eina øking av studningsláninum uppá 5 % og at landskassaveðhaldið fellur burtur.

Ivasamt er, um peningastovnarnir, við núverandi skipan, vilja veita frestandi fíggingina millum 50 % og upp til 70 %, hóast landskassaveðhald. Enn minni sannlikt er, at peningastovnarnir koma at veita 2. veðrættarfígging upp til 65 % uttan fiskoytisábyrgdir.

Vísandi til partin *Íløgutørvur; grundarlag á stødd á verandi skipaflota* er renta-biliteturin ymiskur fyri teir ymisku skipabólkarnar, og verður tí skotið upp at veita ein differentieraðan fiskoytisíløgustuðul, treytaðan av, at eginfíggingin verður økt við tí endamáli, at rentuberandi fíggingin gerst munandi minni og tí meira sannlík at fáa til vega.

Ein differentieraður fiskoytisíløgustuðul kann verða skipaður á tann hátt, at ein ávísur skipabólkur fær ein ávísan fiskoytisíløgustuðul til 15 % íløgustuðulin og sum stendur í mun til eina øking av eginfíggingini. Sum dømi um slíkan fiskoytisíløgustuðul kann hesin vera fyri ein ávísan skipabólk, 5 % um eginfíggingin økist úr 10 % upp í 20 %. Fyri ein annan skipabólk kann fiskoytisíløgustuðulin verða 7.5 % við somu øking av eginfíggingini o.s.v.
Hetta førir við sær, at rentuberandi skuldin verður 50 % ella minni við eini eginfígging uppá 20 % mótí 65 % í rentuberandi skuld við eini eginfígging uppá 10 %.

Frammanfyri á strikumyndini sæst hvussu ein differentieraður íløgustuðul kann verða skipaður eftir skipabólkum. Tá skotið verður upp at differentiera eftir skipabólki, er hetta knýtt at rentabilitetinum fyri teir ymisku skipabólkarnar. Hesini kann henda differentiering verða eitt umboð til at samanseta endurnýggingina av fiskiflotanum. Ein tílík íløguskipan kemur eisini at eggja til, at eginfíggingin verður ríkiliga stórur partur av samlaðu fíggingini.

Sum framgongur av skjalinum á síðu 18, *Mettur íløgutørvur í nýggj fiskiskip*, verður neyðugt við munagóðum rentu- og íløgustuðli og eginfígging..

Ásannandi at torført kann verða hjá verandi reiðarium og einstaklingum at útvega nøktandi eginfígging (20 %), verður skotið upp, at stig verða tikin til, at Føroya Landsstýri, peningastovnarnir og Tryggingarsambandið Føroyar, seta á stovn eitt íløgufelag, har eisini privatir fleggjarar kunnu skjóta inn pening, til tess at luttaka við avmarkaðari eginfígging saman við verandi reiðarium og einstaklingum.

Rentuberandi skuldin er vanliga fíggjað við einum 1. veðretti upp til 50 % úr Realinum og einum 2. veðretti úr føroyskum peningastovni.

2. veðrættur er fyri ein stóran part umfataður av landskassaveðhaldinum og møguligum iskoytisveðhaldi frá partaeigarum.

1. veðrætttur verður afturgoldin yvir 10 ár, har Føroya Landsstýri kann leggja avdráttirnar 1. og 2. árið út móti síðustillaðum 1. veðrætti og sum verður afturgoldin 11. og 12. árið.

2. veðrættur verður vanliga afturgoldin yvir 10 ár.

MØGULIGUR SÁTTMÁLAVEÐHALDSGRUNNUR.

Samsett løgtingslóg nr. 57 frá 08.05.1991 um sáttmálaveðhaldsgrunn fyri føroyskar skipasmiðjur, er landsstýrinum heimilað landskassans vegna í samstarvi við aðrar fíggjarstovnar at stovna grunn, hvørs endamál er at veita veðhald fyri, at føroyskar skipasmiðjur halda skyldur sínar sambært sáttmálum um bygging av skipum.

Landsstýrisins partur í veðhaldsskyldum grunsins kann ikki fara upp um falt 25 % og ikki uppum falt 40 mió. kr. Upphæddir, sum grunnurin veitir veðhald fyri, verða endurtryggjaðar soleiðis, at missurin ikki fer upp um 15 % av upphæddini.

Hesir grunnar er sum kunnugt ongantíð settir á stovn, men hevur landsstýrið, sum tað sæst, heimild til tess. Nevndin hevur viðgjørt spurningin, men mett verður, at fíggjarstovnarnir ikki í løtuni hava stórvegis áhuga í at stovnseta ein sáttmálaveðhaldsgrunn fyri føroyskar skipasmiðjur. Nevndin hevur fingið ábendingar um, at fíggjarstovnarnir helst vilja megna hendan partin sjálvir ella møguliga í samstarvi við tryggingarfeløg.

7. Millumtjóða bindingar

Hóast Føroyar hvørki eru limir í ES ella EFTA, so eru tó handilssáttmálar gjørdir við ES og EFTA-lond, sum hava ávísar bindingar ella seta ávísar fordingar.

Mett verður tó ikki, at sáttmálarnir við ES ella Noreg seta fordingar fyri, at ein almennur stuðul verður latin í sambandi við endurnýgging av føroyska fiskiflotanum. Viðvíkjandi bygging av handilsskipum og fiskiskipum til útflutnings, eiga tó nágreiniligari kanningar at gerast, áðrenn stuðulskipanir (útyvir tey vanliga góðtiknu 9%) verða settar í verk fyri hendan partin av skipasmíði. Harumframt eru Føroyar gjøgnum Danmark limur í OECD, ið ásetur gjøgnum sáttmála landanna millum nakrar reglur fyri limalondini, m.a. í hvønn mun almennur stuðul kann veitast til skipasmíð.

7.1. Stuðulspolitikkurin í OECD

Føroyar eru limir í OECD (Organization for Economic Cooperation and Development) gjøgnum Danmark. OECD hevur tilevnað ein nýggjan sáttmála, ið m.a umfatar skipabygging. Sáttmálin skuldi eftir ætlan setast í gildi í oktober 1996, men orsakað av ávísari mótstøðu frá onkrum av limalondunum, varð undirskrivingin fyribils útsett eitt ár.

Nýggi OECD-sáttmálin miðjar í høvuðsheitum móti, at allur beinleiðis statsstuðul verður avtikin. Tó kann staturin stuðla í sambandi við gransking, menning v.m.

Sáttmátin umfatar bygging og umvælingar av skipum uppá 100 GT ella omanfyri, ið skulu nýtast til at flyta farm ella fólk við ella skip til serlig endamál, t.d. ísbrótarar ella sleipibátar við maskinmegi uppá 365 KW ella meira.

Sáttmálin umfatar tó ikki:
a) før, ið skulu nýtast til hernaðarlig endamál, og
b) bygging og umvæling av fiskiskipum til landsins egna fiskiflota

Soleiðis sum útlitini tí eru í løtuni, vil ein stuðul til endurnýgging av fiskiskipaflotanum í Føroyum ikki verða í stríð við stuðulspolitikkin í OECD.

Fylgiskjøl: Yvirlit FF

Fylgiskjal 1: talva yvir avreiðingarprísir

Fylgiskjal 2: úrdráttur úr handilssáttmálanum við Noregi

Fylgiskjal 3: úrdráttur úr handilssáttmálanum við ES


Fylgiskjal 4: yvirlit yvir galdandi stuðulslógir

Fylgiskjal 5: yvirlit yvir fígging av skipabygging í ávísum londum

Fylgiskjal 6: yvirlit yvir fígging v.m. í Danmark


Talva yvir avreiðingarprísir fyri UPSA í viku 2-17 uppgjørt í $ pr. kg.

Vika nr.	2	5	7	8	9	10	11	13	14	15	16	17	Miðal	Index
Føroyar	0,82	0,73	0,80	0,83	0,82	0,82	0,82	0,62	0,62	0,75	0,76	0,76	0,76	100
Hanstholm	**0,99**	**1,80**	**1,39**	**1,16**	**0,94**	**1,34**	**1,16**	**0,58**	**0,89**	**0,93**	**0,80**	**1,03**	**1,08**	**142**
Ísland	**0,75**	**0,90**	**0,76**	**0,73**	**0,66**	**0,74**	**0,80**	**0,68**	**0,78**	**0,79**	**0,85**	**0,76**	**0,77**	**101**
Noreg	**0,58**	**0,60**	**0,67**	**0,58**	**0,60**	**0,57**	**0,57**	**0,59**	**0,56**	**0,55**	**0,47**	**0,58**	**0,58**	**76**




Talva yvir avreiðingarprísir fyri KONGAFISK í viku 2-17 uppgjørt í $ pr. kg.

Vika nr.	2	5	7	8	9	10	11	13	14	15	16	17	Miðal	Index
Føroyar	1,42	1,30	1,56	1,36	0,90	1,48	1,68			0,80	0,77	0,92	1,22	100
Ísland	**1,39**	**1,51**	**1,08**	**0,91**	**0,90**	**0,86**	**1,41**	**0,85**	**0,87**	**0,93**	**0,84**	**0,85**	**1,03**	**85**




Talva yvir avreiðingarprisir fyri TOSK í viku 2-17 uppgjørt í $ pr. kg.

Vika nr.	2	5	7	8	9	10	11	13	14	15	16	17	Miðal	Index
Føroyar	1,20	1,22	1,41	1,42	1,43	1,38	1,37	1,01	1,01	1,13	1,16	1,30	1,25	100
Hanstholm	1,47	1,57	2,11	2,02	2,02	2,00	1,48	1,53	2,46	2,19	2,19	1,96	1,92	153
Ísland	1,27	1,42	1,30	1,27	1,25	1,28	1,29	1,09	1,25	1,17	1,26	1,11	1,25	99
Noreg	0,95	0,96	0,98	0,86	0,94	0,93	0,94	0,93	0,97	0,89	0,87	0,90	0,93	74
Bretland		1,81	2,71	1,72	2,34	1,87	1,72	2,16	1,70	2,04	1,48	1,88	1,95	155



Talva yvir avreiðingarprisir fyri HÝSU í viku 2-17 uppgjørt í $ pr. kg.

Vika nr.	2	5	7	8	9	10	11	13	14	15	16	17	Miðal	Index
Føroyar	0,88	0,92	1,25	1,16	1,11	1,02	1,04	0,60	0,60	0,92	0,95	0,97	0,95	100
Hanstholm	1,29	1,09	1,57	1,28	1,14	1,20	0,94	0,89	1,23	1,29	1,20	1,15	1,19	125
Ísland	1,30	2,06	1,65	1,43	1,52	1,59	1,32	0,99	1,41	1,30	1,39	1,29	1,44	151
Noreg	0,69	0,65	0,64	0,68	0,66	0,68	0,68	0,58	0,66	0,67	0,67	0,66	0,66	69
Bretland		1,48	2,42	2,03	2,18	1,70	2,18	2,37	1,83	2,25	1,51	1,66	1,96	206



Kelda: North Atlantic Fishing News

fylgiskjal 2

Grein 15

Almennur einkarrættur

Sáttmálapartarnir tryggja, at einhvør almennur einkarrættur til handil í Føroyum og í Noregi verður tillagaður soleiðis, at mismunur á umstøðunum, har vørurnar verða útvegaðar og marknaðarførdar, ikki verður gjørdur millum íbúgvar Føroya og Noregs.

Grein 16

Almennur stuðul

1. Einhvør stuðul frá einum sáttmálaparti ella frá almennari síðu av nøkrum slagi, sum avlagar ella hóttir við at avlaga kappingina við at taka ávísar fyritøkur ella ávísar framleiðslur framum, er í tann mun hann ávirkar samhandilin Føroya og Noregs millum ósamberiligur við røttu mannagongd sáttmálans.

2. Einhvør mannagongd mótsett 1. stk. átti at verið mett við treytunum í fylgiskjali 7 sum grundarlagi.

3. Sáttmálapartarnir skulu tryggja innlit í tiltøk viðvíkjandi almennum stuðli við at skifta upplýsingar sínámillum sum fyrisett í 4. stk. í fylgiskjali 7.

4. Heldur sáttmálapartur, at ávís tiltøk eru ósamberilig við reglurnar í 1. stk., kann hann taka hóskandi stig ímóti hesum tiltøkum, sum skulu ikki elva til størri skaða enn tann, hesi tiltøk hava elvt til, og undir teimum treytum og í samsvar við ta mannagongd, sum ásett er í grein 23.

Grein 17

At verja ogn hugverka

1. Sáttmálapartarnir skulu samarbeiða við tí fyri eyga so líðandi at verja ognarrættindi hugverka betur ímóti mismuni, heruppí at taka stig til at veita og seta í verk slík rættindi. Reglur sáttmálapartanna millum um at verja ognarrættindi hugverka skulu verða nágreiniliga lýstar. Hesar reglur skulu tryggja vernd á samsvarandi støði sum í limalondum Europeiska Felagsskapsins og Europeiska Fríhandilsfelagsskapsins (EFTA).

2. Viðvíkjandi 1. stk. skulu ognarrættindi hugverka

UM TULKING AV GREIN 16

1. Sáttmálapartarnir eru samdir um, at grein 16 verður at fylgja niðanfyri standandi leiðbeiningum:

   (a) Bert slík tiltøk kunnu verða flokkað sum almennur stuðul, sum føra við sær ein netto peningaflutning frá almennum keldum til móttakara gjøgnum beinleiðis studningar, ella sum gjøgnum skattalættar føra mista skattainntøku við sær. Stuðulsveitingar lætnar eftir skipanum, ið tey, sum eru undir skipanini, fult og heilt fíggja, verða ikki roknaðar sum almennur stuðul sambært grein 16. Tá mett verður um, hvørja ávirkan almennar stuðulsveitingar hava, skal samlaða ávirkanin av øllum studningi veitt móttakarunum verða tikin við.

   (b) Hesi tiltøk falla vanliga ikki undir grein 16.

      (i) kredittir og lán frá almennum keldum ella fyritøkum, um rentur og avdráttir samsvara verandi marknaðartreytum;

      (ii) stjórnir og stjórnarstovnar veita veðhald, um veðhaldsgjøldini kunnu bera langtíðarkostnaðin av skipanini;

      (iii) stjórnir ella stjórnarstovnar seta eginpening í, um slíkar íløgur við góðari grund væntandi kasta í minsta lagi eins nógv av sær og tað kostar stjórnini at taka upp lán;

      (iv) skattatiltøk, heruppií almannatryggingargjøld, sum partur av vanligu inntøkureglunum fyri skattaáseting í landinum, sum er fyri allar fyritøkur og eins um alt landið.

   (c) Hesi tiltøk eru dømi um ymsan stuðul, sum vanliga er sambæriligur við reglurnar í grein 16;

      (i) stuðul til gransking, menning og nýskapan, treytað av, at greitt er tilskilað, at hesin er ætlaður at stimbra slíkum virksemi, og at kappingarførið enn er á byrjanarstøði. Undir byrjanarstøði er at skilja gagnnýtt gransking og menning til og við menning av fyrsta frumsniðinum. Sum slíkur stuðul kunnu upp til 50% verða latin av kostnaðinum av verkætlanini ella á annan hátt um skattaskipanina við samsvarandi árini.

Grundgransking kann verða stuðlað enn meir. Nærri marknaðinum ein verkætlan er, lægri eigur almenni stuðulin at verða;

(ii) stuðul til vinnugreinir, sum hava trupulleikar av ovorku, at seta í verk eina skilabót av iðnaðarliga bygnaðinum fyri at tryggja, at framleiðsla og arbeiðspláss verða minkað munandi. Slík tiltøk eiga at verða strangliga tíðaravmarkað og eigur ein tillagingarskipan at fylgja við. Tá mett verður um trupulleikarnar av ovorku, eigur ikki bert støðan í ávísa landinum at verða tikin við, men altjóða støðan sum heild;

(iii) vanligur stuðul til útflutningsfremjandi endamál, eitt nú tjóðarvikur, sølustevnur í sølubúðum, vinnulívsframsýningar, treytað av at stuðulin ikki er ætlaður ávísum fyritøkum;

(iv) stuðul til økismenning í tann mun hann ikki ávirkar rímiligar kappingarumstøður. Endamálið má vera at fáa iðnaðin í menningarøkjum á sama búskaparliga støði sum iðnaðurin aðrastaðni í landinum, og ikki at økja framleiðsluorkuna í vinnugreinum, sum longu líða undir ovorku. At lýsa menningarøki, iroknað øki í iðnaðarligari afturgongd, kunnu bert sáttmálapartarnir sjálvir. Teimum kann verða álagt at útvega hagfrøðiligt tilfar, sum greinar orsøkirnar fyri, at øki verður lýst menningarøki;

(v) stuðul veittur sum vanlig almenn tænasta til iðnað og handil undir slíkum treytum, at tær ikki veita ávísum pørtum av vinnuni ella ávísum fyritøkum framhjárætt;

(vi) vanligur stuðul til at skapa nýggj arbeiðspláss, treytað av at talan ikki er um nýggj arbeiðspláss í vinnugreinum, sum longu líða undir ovorku;

(vii) umhvørvisstuðul, har meginreglan "hann ið dálkar, rindar" verður hildin. Íløgur við serligum atliti til at minka um dálkingina verða stuðlaðar upp ímóti 25% ella á ymsan hátt um skattaskipanina við samsvarandi árini. Ásannandi, at lóggáva ella standardir eru ymisk í øðrum londum og at tað kann ávirka handil og kappingarføri, skal stuðulsveitingarhæddin til serligan iðnað

støðugt verða endurskoðað;

(viii) stuðul til smáar og miðalstórar fyritøkur við tí fyrí eyga at viga upp ímóti vansum, sum beinleiðis eru tengdir at støddini á virkinum. Hetta eru at skilja fyritøkur við færri enn 100 fólkum í arbeiði og eini árligari umferð undir 10 mió. ECU.

Hesi tiltøk eru dømi um stuðul, ið vanliga ikki er sambæriligur við grein 16:

(i) stuðul til fyritøkur at standa ímóti rakstrartapi, beinleiðis ella við avskriving av falnari skuld til almennar myndugleikar;

(ii) at seta eginpening í feløg, um tað hevur sama árin sum stuðul at standa ímóti rakstrartapi;

(iii) stuðul til framleiðslu í vinnugreinum, sum líða undir ovorku ella til fyritøkur í trupulleikum, um ikki ein tillagingarskipan fylgir við, og strangliga tíðaravmarkaður;

(iv) stuðul latin ávísum feløgum sum bjargingartiltak, um hann ikki bert verður latin fyri at fáa tíð til at menna víttfevnandi loysnir og fyri at sleppa undan ógvislígum sosialum trupulleikum;

(v) stuðulstiltøk, íroknað óbeinleiðis skattir, áløgd soleiðis, at mismunur verður gjørdur, so at vørur framleiddar heima hava fyrimun, meðan líknandi vørur framleiddar hjá hinum sáttmálapartinum eru fyri vanbýti.

(vi) tey sløg av stuðli til vøruútflutning til hin sáttmálapartin, sum lýst í uppískoytinum til hetta fylgiskjal.

2. TULKING AV GR. 16 VIÐVÍKJANDI STUÐLI TIL FISKIVINNUNA

Er ikki annað nevnt, falla stuðulstiltøk til fiskivinnuna eftir 31. desember 1992 undir reglurnar í grein 16 í sáttmálanum og tulkingarnar í hesum fylgiskjali.

(i) Hesi stuðulstiltøk til fiskivinnuna eru vanliga ikki sambærilig við sáttmálan:

- almenn stuðulstiltøk, sum fevna um fiskivinnuna sum heild og sum ikki til

støðugt verða endurskoðað;

(viii) stuðul til smáar og miðalstórar fyritøkur við tí fyri eyga at víga upp ímóti vansum, sum beinleiðis eru tengdir at støddini á virkinum. Hetta eru at skilja fyritøkur við færri enn 100 fólkum í arbeiði og eini árligari umferð undir 10 mió. ECU.

Hesi tiltøk eru dømi um stuðul, ið vanliga ikki er samberiligur við grein 16:

(i) stuðul til fyritøkur at standa ímóti rakstrartapi, beinleiðis ella við avskriving av falnari skuld til almennar myndugleikar;

(ii) at seta eginpening í feløg, um tað hevur sama árin sum stuðul at standa ímóti rakstrartapi;

(iii) stuðul til framleiðslu í vinnugreinum, sum líða undir ovorku ella til fyritøkur í trupulleikum, um ikki ein tillagingarskipan fylgir við, og strangliga tíðaravmarkaður;

(iv) stuðul latin ávísum feløgum sum bjargingartiltak, um hann ikki bert verður latin fyri at fáa tíð til at menna vittfevnandi loysnir og fyri at sleppa undan ógvisligum sosialum trupulleikum;

(v) stuðulstiltøk, íroknað óbeinleiðis skattir, áløgd soleiðis, at mismunur verður gjørdur, so at vørur framleiddar heima hava fyrimun, meðan líknandi vørur framleiddar hjá hinum sáttmálapartinum eru fyri vanbýti.

(vi) tey sløg av stuðli til vøruútflutning til hin sáttmálapartin, sum lýst í uppískoytinum til hetta fylgiskjal.

2. TULKING AV GR. 16 VIÐVÍKJANDI STUÐLI TIL FISKIVINNUNA

Er ikki annað nevnt, falla stuðulstiltøk til fiskivinnuna eftir 31. desember 1992 undir reglurnar í grein 16 í sáttmálanum og tulkingarnar í hesum fylgiskjali.

(i) Hesi stuðulstiltøk til fiskivinnuna eru vanliga ikki samberilig við sáttmálan:

- almenn stuðulstiltøk, sum fevna um fiskivinnuna sum heild og sum ikki til

fulnar virka fyri bygnaðartiltøkum sambært reglunum í grein 1 (c) (ii)

- aðrir skattalættar enn teir, sum beinleiðis viga upp ímóti kostnaðarvansum, sum týðuliga eru tengdir at teimum serligu umstøðunum í fiskivinnuni;

- almannatiltøk, um stuðulshátturin í slíkum tiltøkum fer upp um tað, sum vanliga er galdandi í øðrum vinnugreinum við serligum atliti til umstøðurnar í fiskivinnuni.

(ii) Hesi stuðulstiltøk eru vanliga í samsvari við reglurnar í grein 16 í sáttmálanum:

- stuðulstiltøk av beinleiðis innanlands minstaprísum á fiski og keyp av avlopsfiski, til tess at byrgja upp fyri álvarsligari marknaðarórógv;

- stuðulstiltøk til menningarøki í tann mun tey eru neyðug fyri at halda uppi fiskiskapi í økjum, sum yvir miðal dúva uppá slíkt virksemi, og har inntøkurnar frá fiskivinnuni avgjørt liggja undir miðal fyri landið. Slík tiltøk til menningarøkini skulu bert viga upp ímóti kostnaðarvansum samanborin við onnur fiskivinnuøki. Setur ein sáttmálapartur slík tiltøk í verk ella varðveitir hann tey, skal hann eftir reglunum í hesum fylgiskjali útvega tørvandi upplýsingar um støðuna í økinum, sum føra til, at slík tiltøk verða sett í verk ella varðveitt.

(iii) Hesi stuðulstiltøk eru ikki sambærilig við sáttmálan:

- Stuðul sambært 1, stk. (c) (vi) viðvíkjandi fiskivinnuni.

- Stuðul sambært 1. stk. (c) (viii) viðvíkjandi fiskivinnuvirksemi.

3. SKIFTISREGLUR FYRI FØROYAR

Hóast treytirnar í pettunum (i) og (iii) í 2. parti í hesum fylgiskjali kunnu Føroyar til 31. desember 1994 varðveita almenna stuðulin til fiskivinnuna.

INNLIT Í ALMENN STUÐULSTILTØK

Innlit í tiltøk sambært grein 16, 3. stk., í sáttmálanum fevna m.a. um:

- ársfrágreiðing um samlaða stuðulsupphædd og stuðulsbýti;

- fráboðan um nýggjar stuðulsskipanir, og er tað gjørligt helst áðrenn tær verða settar í verk og í seinasta lagi 60 dagar eftir íverksetanardagin, og

- skyldu til eftir áheitan at leggja fram upplýsingar um verandi stuðulsskipanir og serstakar stakveitingar.

2. Teir taka øll vanlig ella serlig stig til tess at tryggja, at skyldurnar í sáttmálanum verða hildnar.

Heldur annar sáttmálapartturin hin sáttmálapartin hava mishildið skyldu í sáttmálanum, kann hann taka hóskandi stig undir treytunum og sambært tí mannagongd, sum ásettar eru í grein 29.

Grein 25

1. Niðanfyristandandi er ósambæriligt við rætta mannagongd í sáttmálanum, um hesi ávirka samhandilin millum Føroyar og Felagsskapin:

(i) allir sáttmálar millum fyritøkur, viðtøkur hjá samtøkum og alt samskipað arbeiðslag millum fyritøkur, hvørs endamál ella úrslit er at forða, avmarka ella avlaga kappingina viðvíkjandi vøruframleiðslu ella vørusamhandli;

(ii) eitt ella fleiri virki misnýta sína sterku støðu á landaøkinum hjá sáttmálapørtunum sum heild ella meginpartinum av hesum.

(iii) ein og hvør almennur stuðul, sum avlagar ella hóttir við at avlaga kappingina við at taka ávísar fyritøkur ella ávísa vøruframleiðslu framum.

2. Heldur ein sáttmálapartur eina ávísa mannagongd vera ósambæriliga við hesa grein, kann hann taka hóskandi stig sambært treytum og mannagongd ásettum í grein 29.

Grein 26

Har, ið innflutningur av eini ávísari vøru veksur ella væntandi veksur til óbótaligan skaða fyri framleiðsluvirksemið á økinum hjá øðrum sáttmálapartinum, og har ið hetta kemst av:

(i) einum sambært sáttmálanum lutvísum ella fullkomiligum niðurskurði í tolli og avgjøldum við samsvarandi ávirkan á viðkomandi vøru hjá innflytandi sáttmálapartinum; og

(ii) tí sannroynd, at tollur ella avgjøld, sum hava samsvarandi ávirkan og sum útflytandi sáttmálapartur leggur á innflutningin av ráevnum ella hálvvirkaðari vøru, sum nýttar eru til at framleiða viðkomandi vøru, er nógv lægri enn samsvarandi tollur ella avgjøld, sum innflytandi sáttmálapartur leggur á;

kann viðkomandi sáttmálapartur taka hóskandi stig sambært treytum og mannagongd ásettum í grein 29.

1.2. Lógargrundarlag

Talva 1: Yvirlit yvir galdandi stuðulslógir

Løgtingslóg	Nr./dagfesting	Stuðulsmøguleikar
Bygging av fiskiførum á føroyskum skipasmiðjum til útflutnings	38 frá 20. mai 1988. Seinast broytt 13. juni 1995.	<u>Nýbygging</u> 1. Veðhald byggilán (innan f. 90% sáttm.prísur) 2. Sáttmálaveðhald 3. Farnaendurgjald, u. t. 4,5% 4. Innflutningsendurgjald, u.t. 13%[2] 5. Rentustudningur u. t. 12% av sáttm.prisinum <u>Umbygging</u> 1. Farnaendurgjald, u. t. 4,5%, tá umbygging er 3 mió. kr. ella meira 2. Innflutningsendurgjald, u.t. 13%, tá umbygg- ing er 3 mió. kr. ella meira 3. Rentustudningur u. t. 12% av sáttm.prisinum, virðið, ið umbyggingin gevur, skal vera 8 mió. kr. ella meira <u>Stuðulstreyt</u> Aðrenn studningurin goldin, má skipið vera avhendað og skrásett uttanlands
Um endurnýgging av fiskiskipa- flotanum[3]	102 frá 19. aug. 1988. Seinast broytt 13. juni 1995.	<u>Nýbygging</u> 1. Stuðulslán, u. t. 10%, yvir 20 Brt tó u.t. 10% og 12% rentustudning 2. Veðhald, byggilán 3. Sáttmálveðhald, deksfiskifør 4. Veðhald fyri lán u. t. 15% av byggiprísinum, tó bert 10% um bygt verður í útlandinum 5. Kurstapslán, givin móti panti 6. Gjaldførislán, givin móti panti 7. Farnaendurgjald, u. t. 4,5%, deksfiskifar 8. Innflutningsendurgjald, u.t. 13% 9. Rentustudningur u.t. 12%. Ásett í kunngerð <u>Umbygging</u> 1. Veðhuld u. t. 30% av íløguni til munandi umbygging av deksfiskifari 2. Stuðulslán, 15% endurrindan av innlegg- ingarkostnaði <u>Stuðulstreyt</u> Lánsveiting er treytað av, at viðkomandi eigari hevur í eginpeningi í minsta lagi 10% av virði skipsins

[2] Sambært galdandi lóggávu, er innflutningsendurgjaldið ásett upp til 13%. Eftir tilmæli frá Sáttmálastovninum er galdandi praksis, at gjaldið er ásett upp til 3,5%.

[3] Í lógini verður nevndur ein grunnur, sum landsstýrið fær heimild at veita stuðulslán úr til endurnýgging av fiskiskipaflotanum. Viðmerkjast skal, at hesin grunnur er avtikin sambært logtingslóg nr. 33 frá 27. Mars 1992 um avtoku av landskassagrunnum. Ístaðin hevur landskassin yvirtikið sær skyldurnar, ið áliggja teim avtiknu grunnunum.

Løgtingslóg	Nr./dagfesting	Stuðulsmøguleikar
Bygging av skipum, bátum og flótandi eindum til alivinnuna	47 frá 8. Juni 1991. Seinast broytt 13. juni 1995.	1. Innflutningsendurgjald u. t. 13% **Stuðulstreyt** Skulu ikki fáa innflutningsgjald endurrindað sambært øðrum skipanum v.m.
Bygging av farmaskipum (sí nota 3)	83 frá 19. juni 1990. Seinast broytt 13. juni 1996.	**Nýbygging** 1. Farmaendurgjald u.t. 4,5% 2. Innflutningsendurgjald u. t. 13% 3. Rentustudningur u.t. 12% 4. Stuðulslán til nýbygging u.t. 10%, hægst 10 mió. kr. fyri hvørt skipi **Umbygging** 1. Farmaendurgjald u.t. 4,5%, 3 mió. kr. ella meira 2. Innflutningsendurgjald u. t. 13% 3. Rentustudningur u.t. 6%

Talva 2: Aðrar lógir í sambandi við stuðulslóggávuna

Løgtingslóg/kunngerð	Nr./dagfesting	Endamál
Ll. um sáttmálaveðhaldsgrunn fyri føroyskar skipasmiðjur	57. 8 mai. 1991	Landsstýrinum verður heimilað landskassans vegna í samstarvi við aðrar fíggjarstovnar at stovna grunn, hvørs endamál er at veita veðhald fyri, at føroyskar skipasmiðjur halda skyldur sínar sambært sáttmálanum um bygging av skipum (sáttmálaveðhald)
Kunngerð um rentustudning til bygging av fiskiskipum	81 frá 8. Aug. 1989	Landsstýrið kann tá bygt verður deksfiskifar yvir 20 brt. á føroyskari skipasmiðju veita upp til 12% í rentustudningi.....Rentustudningurin verður goldin yvir 5 ár við hálvárligum gjaldum, fyrstu ferð ½ ár aftaná at skipið er virðismett. Útrokningargrundarlagið verður niðurskrivað við 10% hálvárliga.....
Kunngerð um eginpening	44 frá 11. mai 1989	Ásetan av egingpeningi í sambandi við lógina um endurnýgging av fiskiskipaflotanum
Ll. um sáttmálaeftirlit	85. frá 9. juni 1988	Stovnurin skal meta um tøkniligar loysnir, prisir og allar partar í teimum byggi- og umbyggingar-sáttmálum, sum liggja til grund fyri umsóknunum... Stovnurin skal geva landsstýrinum tilráðingar í teimum einstoku byggimálunum.

1.2.1. Endamálið við stuðulslóggávuni

• *Tilmæli til landsstýrisfund*

Bilag 3.1
Finansiering af skibsbygning i udvalgte lande

1494 fylgiskjal 5.

Finansieringsparametre og risikopræmier

Parametre	D (1)*	FI (2)	F (3)	NL (4)	I (5)	J (6)	N (7)	E (8)	UK (9)	SK (10)	O (11)	U (12)
Max pct. af kontraktpris	80	80	80	-	(80)	80	80	80	80	80	80	87,5
heraf på basis pant i skibet	50/60	80	70	-		50/60	63	80	50/60	80	50/60	87,5
- heraf statslig garanti-top-up	24/16	-	-	-			17		20/30		20/10	
Løbetid/år	8,5	8,5	8,5	-		13	8,5	12	8,5	13	12/14	25
Rente fast rente pct. p.a.	8	8	8	-			***	8	8		8	***
Grace Periode/år	0	-	-	-		3	0	3	0	5	0	0
Risiko præmie (pct.)												
Eksport	2	2,2	2	-			3,4	-	2		0,8	1,25
Hjemmemarked	2	1,1	-	-			3,4	-	0,5		0,8	0,75

* Særlige betingelser ved hjemmemarkedsfinansiering: Løbetid 12-14 år, grace på 2 - 4 år og markedsrente.
** Markedsrente.
*** Særlig administrativt fastsat rente.

1) Stat - marked Danmark

Statslig styring/ statslig engagement - offentlig/ privat.

Den danske stat er engageret i Skibsfinansiering via Garantifonden for Skibsbygning, der er en statslig fond med det formål indenfor en ramme på 5 mia. dkr. at stille garanti for lån i Danmarks Skibskreditfond, pengeinstitutter eller forsikringsselskaber, eller regaranti over for pengeinstitutter eller forsikringsselskaber, som har stillet garanti for lån optaget i Danmarks Skibskreditfond. Garantien eller regarantien dækker 80 % af den del af lånet, der overstiger det lånebeløb, der er ydet på grundlag af 1. prioritets panteret i skibet uden supplerende sikkerhed (den garanterede del af lånet.) Risikoen skal modsvare en risikopræmie på 2 pct. p.a. med en startekvivalent på 1 pct. af kontraktsummen. Risikopræmien deles pro-rata. Der kan også kombineres med almindelig eksportkredit.

Skibsgarantiordningen er primært etableret for at overvinde den barriere, at de finansielle institutioner viser tilbageholdenhed med at indgå i risici på mere end 50/60 pct. på grundlag af 1. prioritetspant. Statsregarantien giver mulighed for yderligere finansiering op til 80 pct. Den resterende 1/5 skal bæres af den kommercielle finansielle part.

Et særligt udvalg, Skibsgarantiudvalget, varetager administrationen af skibsgarantifonden, med sekretariat i Erhvervsfremme Styrelsen.
Administrativt superviseres de danske skibsfinansieringsordninger af Erhvervsministeriet.

Institutionelstruktur

Skibsfinansiering er i Danmark hidtil næsten udelukkende foregået via Danmarks Skibskreditfond (DSKF), der er selvejende (Nationalbanken, private banker, forsikringsselskaber, skibsværfter og rederier har stillet garanti på 300 mio. dkr. for aktiviteterne). DSKF stiller finansiering til rådighed på fleksible vilkår:
- CIRR baseret, 12 års løbetid (op til 14,4 år) med 2 års grace,
- OECD-vilkår, dvs. 8 pct.fast rente, 8,5 års løbetid. Danmarks Skibskreditfond varetinger sagsbehandling.

Konkurrence-marked

Enkelte danske banker har på det seneste vist stigende interesse for selv at finansiere ny- og ombygning af skibe ved danske værfter under forudsætning af, at der kan opnås garantier under bl.a. Garantifonden for Skibsbygning. I praksis er det dog primært Skibskreditfonden, der er operatør.

Kunde-bruger-relationer

Primært via skibskreditfonden eller via finansiel institution.

Statsstøtte	Max. subsidium på 9 pct ydes som kombination af statslig regarantí (1 pct) og kontraktrelateret støtte til køber.

2) Stat-marked Finland

Statslig styring/ statslig engagement Offentlig/ privat.	Det finske eksportkreditselskab er 100 pct. statsejet. Der ydes Eksportfinansiering til alle erhverv. Lån og kredit stilles via garantier udstedt af det finske garantiråd, der er en statsinstitution under Handels-og Industriministeriet. Der skelnes ikke mellem eksport-og hjemmemarkedsfinansiering. Der tilbydes finansiering på OECD-vilkår, dvs. 80 pct. 8.5 års løbetid og 8 pct. fast rente. Der finansieres i national valuta. Risikopræmien er ved eksport ca. 2,25 pct. og ved hjemmemarkedsfinansiering ca. 1,25 pct.
Beslutningsstruktur	
Institutionel struktur	Statslig ordning.
Administration	
Konkurrencemarked	Der foreligger ikke oplysninger om eksistensen af alternativer til den statslige kredit.
Kunde-bruger relationer	Samtsyuligvis via private finansielle institutioner.
Statsstøtte	Det er oplyst, at der ikke ydes statsstøtte til skibsværfter eller til redere.

3) Stat-marked Frankrig

Statslig styring/ statslig engagement Offentlig/ privat.	Ministeriet for Industri, Transport og Turisme er ansvarlig for de eksisterende skibsfinansieringsordninger. Den operative institution er den franske eksportkreditinstitutionen "COFACE", der tilbyder eksportforsikring for alle erhvervsvirksomheder. Ifølge de foreliggende oplysninger tilbydes alene eksportfinansiering og ikke hjemmemarkedsfinansiering på OECD-vilkår, med normalt 70 pct. finansiering, med 8,5 års løbetid, 8 pct. fast rente og 2 pct. i risikopræmie. Der finansieres i national valuta.
Beslutningsstruktur	Der ydes muligvis herudover subsidier til værfter, som præmie til redere, der placerer ordrer på et fransk værft.

1495

Institutionelstruktur	Statslig funderet finansiering der administreres i statsligt regi.
Administration	
Konkurrencemarked	Det vides ikke, om der eksisterer noget konkurrencemarked.
Kunde-bruger-relationer	Via statsinstitution og finansielle institutioner
Statsstøtte	Det er oplyst, at der ydes støtte i overensstemmelse med EU's 6. og 7. skibsbygningsdirektiv.

4) Stat-marked Holland

Statslig styring/ statslig engagement Offentlig/ privat.	Der eksisterer ingen statslige kreditordninger rettet mod skibsfinansiering i Holland. Finansiering vil således skulle finde sted på den private marked. Det hollandske Økonomiministerium administrerer derimod de hollandske støtteordninger, der enten indebærer
Beslutningsstruktur	- 9 pct's støtte til de enkelte værfter eller - matchningsstøtte i relation til udenlandsk konkurrence (udenlandsk rente/valutafordel swappes ud).
Institutionel strukter	Private markedsoperatører
Administration	
Konkurrencemarked	Finansiering tilbydes af private banker.
Kunde-bruger-relationer	Private operatører.
Statsstøtte	9 pct. i overensstemmelse med EU's 7. direktiv - kontraktrelateret.

5) Stat-marked Italien

Statslig styring/ statslig engagement Offentlig/ privat	Subsidier til skibsbygningsindustrien administreres af statsinstitutionen "Mediocredito Centrale", der ligefedes administrerer udbetaling af subsidier til kommercielle finansieringsinstitutioner.
Beslutningsstruktur	Ifølge oplysninger fra italienske kilder overholdes OECD-reglerne for skibsfinansiering. Der ydes rentestøtte til redere beregnet som forskellen mellem renteomkostningerne i italienske lire på et hypotetisk lån på 80 pct. af kontraktprisen og de tilsvarende renteomkostninger, såfremt lånet ydes på OECD-vilkår. Forudsætningen er at skibet kontraheres på EU-værft. Der ydes finansiering til eksport og hjemmemarked. Der finansieres normalt i national valuta, men tilbydes også lån i fremmed valuta, normalt i EU-valutaer eller USD
Institutionel struktur	Der foreligger ikke yderligere oplysninger.
Administration	
Konkurrencemarked	Skibsfinansiering ydes af både private og offentligt ejede og kontrollerede banker.
Kunde-bruger-relationer	Der foreligger ikke oplysninger.
Statsstøtte	Omfattende statsstøtte, primært ydet som investeringsstøtte og rabatkompensationsstøtte på grundlag af EU's 6. direktiv om statsstøtte til skibsbygningsindustrien. 7. direktiv er først gennemført i 1994.

6) Stat-marked Japan

Statslig styring/ statslig engagement Offentlig/ privat.	Den Japanske Udviklingsbank (JDB), som er 100 % statsejet, yder kredit på 50-60 % af kontraktbeløbet. Kredittiden er 13 år med en grace periode på 3 år og en fast rente på 6,2 % (10/4 1990) i.f.t. CIRR på 7,7 %. Eksportrenten er på 6,1 % brutto.
Beslutningsstruktur	
Institutionel struktur	Der foreligger ikke relevante oplysninger
Administration	

Konkurrencemarked	MCC, som er delvis statsejet, yder lån til kystskibe (inter-ne skibe) med en kredittid på 7-15 år og 3 års grace
Kunde-bruger-relationer	Der foreligger ikke relevante oplysninger
Statsstøtte	EU-Kommissionen har beregnet, at støtteelementet er 6,9 % sammenholdt med OECD-ministerens på 8 %. I forhold til en CIRR-rente på 7,7 % er støtteelementet beregnet til 5,25 %.

7) Stat-marked Norge

Statslig styring/ statslig engagement Offentlig/ privat.	Det statsligt ejede GarantiInstitut for EksportKredit (GIEK) tilbyder garantier til eksportfinansieringsselskabet "Eksportfinans" og til andre finansielle institutioner. Eksportfinans er 97 pct. ejet af de 4 største norske banker.
Beslutningsstruktur	Der ydes ikke subsidier i forbindelse med finansiering af eksport eller hjemmemarkedssalg, herunder rentestøtte. Den almindelige eksportkreditordning kan anvendes. GIEK yder garantier i forbindelse med finansiering af kontraherede skibe på grundlag af en grundig kreditvurdering og mod at låntagers bank påtager sig en betydelig risiko med 1. prioritetspant i skiber. Der er landebegrænsning på garantiudstedelse. Finansiering ydes i overensstemmelse med OECD-reglerne, dvs. garanti op til 80 pct. (incl 37 pct. top-up), 8,5 års løbetid og en cost/markedsbaseret rente, der fastsættes på det åbne rente swap-marked. Der finansieres normalt i national valuta, men der kan tilbydes finansiering i enhver større konvertibel valuta. Risikopræmien er ca. 3,3% for både eksport og hjemmemarkedsgaranti. Der kræves 100 pct. selvskyldnerkaution fra GIEK eller fra anerkendt international bank
Institutionel struktur	Statslig garanti og administration, samarbejde med private finansielle institutioner.
Administration	
Konkurrencemarked	Eksportfinans og de private banker, domineret af Eksportfinans.
Kunde-bruger-relationer	Via finansielle institutioner.

Statsstøtte	Ydes som produktionsstøtte i overensstemmelse med EU's 7.direktiv.

8) Stat-marked Spanien

Statslig styring/ statslig engagement Offentlig/ privat.	Subsidieret eksportkredit og finansiering udbydes af den statsejede bank: Banco Exterior de Espana og via den halvprivate bank: Cia. Espanola de Seguros de Credito a La Exportation, samt via private banker. Der foreligger kun begrænsede detaljerede oplysninger, men det oplyses, at der i Spanien ydes finansiering på OECD-vilkår, dvs. op til 80 pct. og 8 pct. rente, men med 12 års løbetid og 3 års grace. Der finansieres primært i national valuta, men også i enhver anden konvertibel valuta. Den spanske stat deltager ikke i finsiering i fremmed valuta. Der ydes støtte, såfremt de konkrete kreditbetingelser overstiger OECD-betingelserne.
Beslutningsstruktur	Det er oplyst, at subsidierne er begrænset til 3 pct. pr. år.
Institutionel struktur	Der foreligger ikke yderligere oplysninger.
Administration	
Konkurrencemarked	Der foreligger ikke oplysninger
Kunde-bruger relationer	Der foreligger ikke oplysninger
Statsstøtte	Spanien var indtil udgangen af 1991 undtaget fra EU's 7. direktiv om statsstøtte til skibsbygningsindustrien, herunder loftet for statsstøtte. Det er oplyst, at en række statsejede spanske værfter i en årrække har haft underskud, der er blevet dækket af det statslige holdingselskab INI.

9) Stat-marked Storbritannien

Statslig styring/ statslig engagement Offentlig/ privat.	Eksportfinansiering er administreret af "Export Credit Guarantee Department " ECGD" i Handels-og Industriministeriet (DTI). Hjemmemarkedsfinansiering tilbydes via det private selskab "Ship Mortgage Finance Co plc. Der ydes garanti fra Handels-og Industriministeriet til kommercielle låntagere.
Beslutningsstruktur	Både eksport og hjemmemarkedsfinansiering overholder OECD-regleme, dvs. 8 pct. fast rente, en løbetid på 8,5 år og en garantipremie på 2 pct. ved eksport og ca. 0,5 pct. ved hjemmemarkedsfinansiering. Der tilbydes statsgaranti på normalt 50 pct. ved eksport og 60 pct. ved hjemmemarkedsfinansiering. Finansiering i national valuta.
Institutionel struktur	Statslig eksportfinansiering og privat hjemmemarked-finansiering.
Administration	
Konkurrencemarked	Der er sandsynligvis tale om eksistensen af andre private finansielle operatører, særligt på hjemmemarkedsfinansieringsområdet.
Kunde-bruger-relationer	Der foreligger ikke præcise oplysninger.
Statsstøtte	Der ydes statsstøtte i overensstemmelse med EU's 7. direktiv. Støtten ydes til skibsværfter på basis af cost.

10) Stat-marked Sydkorea

Statslig styring/ statslig engagement Offentlig/ privat.	Den koreanske Eksport/Import bank (KEXIM), som finansierer sig i Centralbanken, bl.a. ved træk på valutareserverne, men uden statslige omkostninger, er ansvarlig for eksportkreditter, -garantier og/eller eksportkreditforsikring. Både køber og sælgerkreditter anvendes.
Beslutningsstruktur	Som adgangskriterie må køberen betale mindst 20% af kontraktsummen før skibets levering. Lånet må være fuldstændig garanteret af en første klasses bank eller køberlandets regering eller centralbank.

Finansiering sker op til 85% af nettokontraktsummen, resten finansieres af private banker.
Der finansieres primært i USD, men også Yen, DM og CHF er tilgængelige. Der findes ikke lån- og vekselgaranti.

For hjemmemarkedssalg tilbyder den statsejede koreanske udviklingsbank (KDB) subsidierede lån. For højsøskibe ydes 80 % lån med 10 års løbetid incl. 5 års grace til LIBOR + 2. For kystskibe ydes lån med en maksimal løbetid på 10 år incl. en graceperiode på 1/3 med rentesats 10,5 %, eller ved anvendelse af udenlandsk rente LIBOR + 1,25 %.

Institutionel struktur — Der foreligger ikke relevante oplysninger.

Administration

Konkurrencemarked — Der foreligger ikke relevante oplysninger.

Kunde-bruger relationer — Der foreligger ikke relevante oplysninger.

Statsstøtte — I byggeperioden ydes ved finansiering i USD lån til 10 %, som kan opbringes til en USD-rente på 20 %, dvs. med en intern rente på 10 % p.a., svarende til et subsidium på 20 % over 2 år som følge af renteforskellen. Støtteniveauet i LIBOR + 1,25 % svarer til under 1 % i subsidie.

11) Stat-marked Tyskland

Statslig styring/ statslig engagement Offentligt/privat. — Skibsfinansiering tilbydes i Tyskland bl.a. via Kreditanstalt für Wiederaufbau (KfW), der er støttet og majoritetsejet af den tyske forbundsrets. KfW yder finansiering til alle tyske industrierhverv og administrerer de tyske statsstøtteordninger til skibe. Forbundsregeringen tilbyder ikke statsgarantier i forbindelse med lån i KfW.

Beslutningsstruktur — Det normale er at sådanne garantier ydes af de tyske lokalregeringer med henblik på at sætte KfW i stand til at tilbyde 80 per. lån på grundlag af 1. pant.

Der differentieres ikke mellem eksport-og hjemmemarkeds-finansiering, der finder sted på OECD-vilkår, dvs: 80 pct. 8 pct. rente og 8½ år.

Den almindelige tyske eksportkreditordning kan også anvendes.

Der kan ydes en rentestøtte med et fastsat et stemteloft på 2 pct. for lav rentevaluta og et 4 pct. loft for højrentevaluta. Støtten udbetales når lånerenten incl. marginal overstiger 8. pct. p.a. Rentestøtten udbetales til reder i maksimalt 8,5 år. Lån på OECD-vilkår kan kombineres med længerevarende lån på kommercielle vilkår.

Der finansieret i DM. Optages lån i anden valuta konverteres lånet til en syntetisk DM-hovedstol. Rederen bærer valutakurs risikoen. Risikopræmien ved eksport og hjemmemarkedsfinansiering er fastsat til 0,8 pct.

Institutionel struktur — Skibsfinansieringen administreres på den særlige måde, at rammebeløb/blokke alloketes til de individuelle værfter for en 3 årig-periode. Værfterne er herefter ansvarlige for at anvende finansieringen på specifikke kontrakter. Rammebeløbene er endelige og nødvendiggører værfternes selektive anvendelse. Der kan foretages en fordeling på flere kontrakter, hvilket medfører en lavere subsidieeffekt pr. kontrakt.

Administration — Skibsfinansieringen og værftsstøtten administreres således decentralt i samarbejde med KfW.

Konkurrencemarked — KfW finansierer ca. 1/3 af skibene fra de tyske værfter. Resten finansieres af den private sektor. Der er to skibsfinansieringsinstitutter, som er ejet af de største tyske banker, og som kan yde lån på 60% baseret på udstedelse af obligationer.

Kunde-bruger-relationer — Værfterne opererer overfor køberne m.h.t det direkte subsidium.
Rentestøtten udbetales til rederen via den bank, der forestår finansieringen. Værfter/Rederi forhandler direkte med långivende bank, som ansøger om rentestøtte hos KfW.

Statsstøtte — Statsstøtte i overensstemmelse med EU's 7. skibsbygningsdirektiv, fordelt 1:1 mellem central og lokal stat. Der ydes rentestøtte (Werftbilfen) 2-4 pct., direkte værftsstøtte (Wettbewerbshilfen) max. 9 pct. mærkning og Finanzbeihilfen 0,425 pct., der fordeles på værfterne efter omsætning. Støtten fordeles inden for en samlet maksimeret budgetramme.

12) Stat-marked USA

Statslig styring/ statslig engagement Offentligt/ privat.	Der eksisterer ikke subsidierede eksportfinansieringsordninger, men et statsligt garantisystem, der tilbyder garanti op til 87, 5 pct. af kontraktværdien med en løbetid på 25 år. Der finansieres i USD med en fast rente og en risikopræmie på ca. 1,25 for eksport og 0,75 ved hjemmemarkedsgaranti.
Beslutningsstrukturer	I praksis bygges der på amerikanske værfter kun skibe til hjemmemarkedet.
Institutionel struktur	Statsligt regi Der opereres via private finansielle institutioner.
Administration	
Konkurrencemarked	Der foreligger ikke oplysninger om dette.
Kunde-bruger-relationer	Der foreligger ikke oplysninger.
Lutfallsligi stóri innflutningurin úr Danmark kundi bent á, at danska heilsøluliðið, sum føroyskir innflytarar keypa frá er sera kappingarført mótvegis øðrum londum og/ella at føroyska innflutningsliðið ikki í nóg stóran mun leitar fram alternativar innflutningskeldur.

Vøruútflutningurin til Danmarkar var 560 mió kr ella ¼ av øllum útfluttum vørum. Tænastuútflutningurin til Danmarkar var 200 mió kr ella 2/3 av øllum útfluttum tænastum. Inntøkuflytingar úr Danmark vóru 1.580 mió kr, sum vóru nærum allar flytingar til Føroya, her uppí er ríkisstuðulin uppá 1.130 mió kr.

Av tí peningarensli, sum er millum Føroyar og útheimin, er sostatt ein týðandi partur millum Føroyar og Danmark.

Inntøkuávirkanir

Gjaldingar á loypandi postum á gjaldsjavna ávirka virksemi í Føroyum og Danmark. Fyri at lýsa virksemisárinið í Danmark av føroyskum keypi og flytingum til Danmark - og øvugt - er gjørd sonevnd input-output uppgerð. Taltilfar til hesa uppgerð hevur ikki verið gott, men kann uppgerðin tó í høvuðsheitum nýtast til at lýsa ávirkanir á inntøkugerðina, sum stendst av samskiftinum landanna millum.

Uppgerðin visir, at samskiftið hjá Danmark við Føroyar hevur bæði positivar og negativar inntøkuávirkanir í Danmark. Gjaldingarnar fyri danskan útflutning av vørum og tænastum til Føroya skapa inntøkur í Danmark, meðan ríkisstuðulin til Føroya minkar

um inntokugerðina í Danmark. Í Føroyum skapar útflutningurin til Danmarkar inntokur í Føroyum, eins og ríkisstuðulin skapar inntokur í Føroyum.

Input-output uppgerðir eru gjordar fyri árini 1980, 88 og 93. Undir einum benda hesar uppgerðir á, at inntokugerðin í Danmark av føroyskum ávum er lutfallsliga stór í mun til inntokugerðina í Føroyum av donskum útreiðslum til Føroya, tá ið hall er á gjaldsjavna Føroya og stórar útreiðslur fata fram á gjaldsjavnanum.

Í 1988, tá met-stórt undirskot var á gjaldsjavnanum, var inntokugerðin í Danmark stavandi frá føroyskum útreiðslum til Danmarkar 3,4 mia kr, meðan inntokugerðin í Føroyum í samband við samskifti við Danmark var 2,3 mia kr. Umleið 20% av føroysku bruttotjóðarúrtokuni í 1980 og 1988 stavaðu beinleiðis og óbeinleiðis frá ríkisveitingum.

Í 1993, tá ið stórt yvirskot var á gjaldsjavnanum, var inntokugerðin í Danmark av samskifti hjá Danmark við Føroyar bert 0,6 mia kr meðan inntokugerðin í Føroyum av donskum útreiðslum til Føroyar var 2,7 mia kr.

Út við 30% av føroysku bruttotjóðarúrtokuni í 1993 stavaði frá ríkisveitingunum. Veksturin av partinum av bruttotjóðarúrtokuni, sum stavar frá ríkisveitingunum frá 20% í 1980 og 1988 til 30% í 1993 hongur serliga saman við stóra fallinum í føroysku bruttotjóðarúrtokuni í árunum 1990-93.

Búskaparástøðilig umrøða av ríkisveitingunum til Føroya

Í kapitli 3 er ein búskaparástøðilig umrøða av ávirkanum, sum ríkisstuðulin hevur á føroyska búskapin. Trý fyribrigdi verða umrødd:

a) hvussu stór multiplikatorávirkan er á tjóðarinntoku og framleiðslu,
b) hvussu verður kreditvirðið ávirkað og hvussu ávirkar hetta búskapin,
c) hvussu verður kappingarførið ávirkað og harvið samansetingin av framleiðsluni.

Multiplikator ávirkan

Við einum búskaparmodelli verður vist, hvussu sambandið er millum innlendskan eftirspurning og týðandi stoddir í tjóðarroknskapinum, so sum framleiðslu, inntoku og annað, tá ið javnvág er millum inntokur og útreiðslur við útlond.

Í tíðarskeiðinum 1962-74 var á leið javnvág á føroyska gjaldsjavnanum við útlond. Tí verður hildið, at ávirkanin frá ríkisstuðlinum í hesum tíðarskeiðnum kann lýsast á sama hátt, sum danski búskaparfrøðingurin Martin Paldam hevur lýst tann grønlendska búskapin.

Í Føroyum vóru ilogurnar í hesum tíðarskeiði eini 29% av BTÚ, meðan tilsvarandi lutfall í øðrum londum var 20-25%. Sannlikt er, at ríkisstuðulin hevur fingið føroyingar at gera storri ilogur, enn teir annars hovdu gjort; m.a. tí at tað ikki var neyðugt at krevja skattir til at figgja tann vaksandi almenna sektorin. Í einum samfelag við vakstrarmoguleika skapa øktar ilogur storri framleiðslu. Ein partur av teimum almennu útreiðslunum er til dømis farin til útbúgvingar og hevur soleiðis økt um tann føroyska framleiðsluførleikan. Tað er tí rímuligt at siga, at ein partur av framleiðsluni (BTÚ) stavar frá ríkisstuðlinum.

Ríkisstuðulin var í tíðarskeiðinum um 12% av BTÚ. Visti tú, hvat føroyingar hovdu gjort, um stuðulin ikki var, so kundi verið sagt nágreint, hvussu stórur multiplikatorurin í samband við ríkisveitingarnar var, men hetta vita vit av góðum grundum ikki. Var tann

parturin av BTÚ, sum stavaði frá ríkisstuðlinum, helvtin av stuðlinum, so hevði multiplikatorávirkanin verið 0,5. Hevði BTÚ parturin hinvegin verið líka so stórur sum ríkisstuðulin, var multiplikatorurin 1, og hevði BTÚ parturin verið hálvaaðru ferð stuðulin, so var multiplikatorávirkanin 1,5.

Input-output útrokningarnar fyri árini 1980, 88 og 93 benda á eina multiplikatorávirkan eftir stuttari tíð, sum er umleið 1,5. Minka ríkisveitingarnar við 10% av BTÚ hevur hetta við sær eina lækking av BTÚ uppá 15%. Sum frá líður fær vinnu- og prísbygnaðurin lagað soleiðis, at bruttotjóðarúrtokan verður stórri aftur. Hetta svarar til at langtíðar multiplikatorávirkanin frá ríkisveitingunum er minni enn 1,5.

Kreditvirðis ávirkan

Í tíðarskeiðinum 1975-89 var, tá talt verður saman, stórt hall á føroyska gjaldsjavnanum við útlond. Nettoskuldin til útlond, sum ikki var stór í 1974, vaks heilt upp í 8,5 mia kr við árslok 1989. Altjóða figgjarmarknaðurin varð latin upp hesa tíðina og føroyingar tóku ríkiliga til sín av moguleikunum at lækna keypsorku.

Hetta skeiðið vóru íløgurnar eini 33% av BTÚ. Nokur ár í 80-unum vóru tær millum 40 og 50% av BTÚ. Uppsparingin, sum framvegis var stór í altjóða hopi, minkaði nakað, so Føroyar hovdu hall á gjaldsjavnanum, sum í fleiri ár var eini 8 til 10 % av BTÚ. Íløgurnar vóru í roynd og veru ógvuliga stórar hesa tíðina og skaptu eitt virksemi, sum broytti framleiðslubygnaðin. Byggivinnan vaks nógv og aðrar vinnur, eitt nú fiskivinnan á sjógvi og landi, fingu ikki fólk. Arbeiðsfólk varð í stóran mun fingið uttaneftir. Hóast hesar stóru íløgur viknaði veksturin nógv hesa tíðina. Sostatt vóru tær stóru íløgurnar í stóran mun til fánýtis.

Frá 1975 til 1989 var ríkisstuðulin 15% av BTÚ. Millum 1983 og 1989 var lántokan serliga stór. Ríkisstuðulin var 750 mió kr í miðal pr ár, meðan nettolántokan var 950 mió kr í miðal. Hóast lántokan hesa tíðina varð framd av privatum, so vóru trygdirnar bert í ávísan mun frá teimum privatu virkjunum. Í nógv stórri mun vóru tær frá landsstýrinum og peningastovnunum sum ábyrgdir.

Sum partur av ríkinum og við ríkisstuðlinum hevur landsstýrið lænt kreditvirði frá donsku stjórnini. Við veðhaldum lat landsstýrið part av hesum kreditvirði víðari til peningastovnar og privat virki.

Kreditvirðið hjá føroysku peningastovnunum var harumframt yvirmett. Hetta ov stóra álitið á peningastovnarnar stavaði ma. frá, at teir vóru undir eftirliti av danska figgjareftirlitinum.

Ávirkan á kappingarførið

Grundgivið verður fyri, at stórar veitingar uttanifrá ávirka framleiðslusamansetingina, sum eisini verður nevnt um byggivinnuna og fiskivinnuna omanfyri. Serstakliga tá ið framleiðslukapasiteturin verður gagnnýttur fult, verða trupulleikar við búskaparligu javnvágini. Nýtt virksemi verður skapt av stuðlinum, og annað virksemið má leggjast niður fyri at halda javnvágina. Henda tillaging hendir oftast gjognum hækking í kostnaðarleguni, og vinnur, har prísurin á framleiðsluni er mest týðandi kappingarparametur, koma í vanda fyri at detta niðurfyri.

Hinumegin telur tað eisini við, hvussu samfelagið velur at brúka stuðulin uttanífrá. Ílogur í infraskipanina binda landið saman og lætta um flutning og samskifti hjá fólki og virkjum, meðan eitt gott skúlaverk styrkir um moguleikarnar at gerast minni heftur av vøruprísum, tí at virkini verða for fyri at veita tænastur og at framleiða tílíkt, har dygd og álit vera meira eftirspurd enn lágur prísur.

Kapitalisering av ríkisstuðlinum

Í kapitli 4 verða roknireglur fyri kapitalisering av ríkisstuðlinum gjøgnumgingnar. Fortreytir og viðurskifti av týdningi fyri kapitalisering verða umrødd. Nokur roknistykki verða eisini gjord, har tol verða sett á.

Útrokning av kapitalvirði

Ríkisstuðulin verður, sum er, útgoldin landsstýrinum sohvørt. Ein kapitalisering av stuðlinum svarar til, at danska stjórnin tók eitt lán og rindaði Føroya landsstýri lánsupphæddina, og í staðin fyri at rinda stuðulin so hvørt til landsstýrið, skuldi danska stjórnin rinda árligu upphæddina sum rentur og avdráttir til lánveitararnar.

Semjast landsstýrið og danska stjórnin um, at føroyingar skulu hava stuðulin í allar ævir, svarar tað til, at danska stjórnin bert skal gjalda rentur fyri lánið og ikki avdráttir. Tá verður talan um eina stóra upphædd. Annars noyðast partarnir at semjast um eitt áramál, sum svarar til, at stjórnin eisini skal rinda avdráttir fyri lánið, og upphæddin til landsstýrið verður tá minni.

Rentustigið hevur eisini stóran týdning fyri eina kapitalisering. Tað er realrentan, sum er navnarentan reinsað fyri inflatión, sum verður brúkt í tílíkum roknistykkjum. Hog renta gevur eitt lágt kapitalvirði, og lág renta gevur hogt kapitalvirði.

Heildarveitingin frá donsku stjórnini var 860 mió kr í 1996. Rentan fyri long ríkislán (28 ár) er stívliga 8% og inflatiónin er um 2%. Við hesum fortreytum hevði ein óendalig gjaldsrøð givið eitt kapitalvirði uppá 14,1 mia kr. Vóru partarnar samdir um at umleggja stuðulin eftir einari 8 ára gjaldsrøð, skuldi rentan verið 7% og kapitalvirðið hevði tá verið 5,6 mia kr. Ein 5 ára gjaldsrøð hevði givið eina rentu uppá 6% og virði uppá 3,8 mia kr.

Onnur týðandi viðurskifti

Omanfyri er vist á, at tann stóra lántokan í 80-unum bygdi í ollum førum lutvist á kreditvirði, sum stavaði frá ríkisstuðlinum og ríkisfelagsskapinum. Í tann mun at sjónarmiðið er rætt, so hava føroyingar og lánveitarar roknað við einum kapitalvirði av blokkinum. Danska stjórnin hevur við at veita landsstýrinum lán átikið sær ta skyldu, sum lánveitararnir væntaðu av teimum, og skuldin fordar donum fyribils at lækka ríkisstuðulin. Úr hesum sjónarmiði kann sigast, at stuðulin longu er kapitaliseraður.

Hevði heildarveitingin verið umlogd við kapitalisering eftir 8 árum, hevði gjaldsjavnin versnað við umleið 500 mió kr. Inntøkurnar hevdu minkað við um 900 mió kr, tí loypandi stuðulin datt burtur, meðan útreiðslurnar hevdu minkað um 400 mió kr, tí rentuútreiðslurnar minkaðu og tí skuldin minkaði við 5,6 mia kr. Varð kapitaliseringin framd eftir gjaldsrøð við sera longum áramáli, hevði gjaldsjavnin ikki verið broyttur so nógv, tí tann ognin, sum var eftir, tá skuldin var goldin, hevði givið so mikið av sær.

Fylgjurnar hjá landskassanum hovdu verið tilsvarandi. Við nevndu kapitalisering yvir 8 ár, hevði landskassin fingið minkað um yvirskotið ella vaksið um undirskotið við umleið 500 mió kr.

Ein spurningur, sum longu hevur stungið seg upp, er, um Føroyar eiga oljurikidømi. Í avtalum, sum longu eru gjørdar, er fyrivarni tikið fyri, at inntokur haðani skulu brúkast til at minka skuld og stuðul.

Fyrimunir og vansar við umlegging av heildarveitingum eru kanska meira av politiskum slag, enn av figgjarligum og búskaparligum slag. Føroyskir og danskir myndugleikar skulu hvør sær gera upp, hvat teir vilja, og hvat kann náast, áðrenn ein umlegging kann fremjast. Teir spurningar, sum har stinga seg upp, verða í hvussu er líka so nógv politiskir sum búskaparligir.

Kapitalstreymar

Í kapitli 5 verður umrott, hvussu kreditvirði og tapsváði, ið eru lutfalsliga nýggj fyribrigdi í føroyskum tjaki um búskap, hanga saman við liberaliseringunum av figgjarmarknaðum, sum eru farnar fram í eini 25 ár, og gongdini í samhandli millum lond í eini 200 ár.

Tey seinastu 25 árini eru valutareglurnar hjá Danmark, og sostatt eisini Føroyum, gjørdar alsamt minni forðandi fyri at gera figgjarílogur í útlondum og til at útvega figging har. Tey seinastu árini eru føroyskar skattalógir broyttar soleiðis, at innlán í føroyskan peningastovn, sum frammanundan hovdu stóran skattligan fyrimun, eru meira javnsett við aðrar figgjarílogur. Við hesum broytingum eru formligar forðingar fyri pengastreymar millum Føroyar og útlond minkaðar munandi.

Miðsavnan av tapsváða

Føroyingar vóru nakað seinir at lata upp fyri figgjarílogum í útlondum, meðan teir vóru skjótari at lata upp fyri lántoku uttanlands. Sum áður nevnt, varð nógv lænt í útlondum. Hetta hevði m.a. við sær, at peningur hópaðist í peningastovnunum. Peningastovnunum varð latið upp í hendur at rokja tað samfelagsliga gjaldførið. Tá brúk var fyri afturhaldi í ílogum í 80-unum, var figging eingin floskuhálsur, tí gjaldførið var so rikiligt. Av tí at peningastovnarnir og landsstýrið áttu tær ringastu trygdirnar fyri lánum og ábyrgdum, var tapsváðin miðsavnaður hjá hesum báðum sera umráðandi samfelagsstovnum.

At føroyski figgjarheimurin varð latin so ójavnt upp fyri samstarvi við altjóða figgjarmarknaðin eigur tí lut í, at samfelagið kollsilgdi í 1992 og 1993.

Broytt ílagumynstur

Aftaná kollsigilingina er peningur plaseraður øðrvísi enn frammanundan. Landsbankin, sum umsitur gjaldførið hjá landinum, hevur sett pengar uttanlands av gjaldførisgrundum. Tryggingar, fyritokur og húsarhald hava flutt pengar av landinum, helst fyri at økja trygdina við spjaðing. Hetta er eisini í ávísan mun gjørt, hóast ein ílaga í Føroyum gevur skattafyrimun.

Hetta mynstur má væntast at halda fram, um hildið verður fast um tær gjørdu liberaliseringarnar. At føroyingar fara at hava figgjarogn í útlondum ger, at figging skal útvegast í útlondum til part av tí búskaparliga virkseminum.

Kreditvirðið hjá lántakarum fær av hesum ein vaksandi týdning. Kreditvirðið hjá ti almenna og hjá privatu fyritokunum má styrkjast bæði mótvegis føroyingum og útlendingum. Fyriskipanir mugu verða gjordar, so tapsvandin verður spjaddur og ikki miðsavnaður hjá t.d. landsstýri og peningastovnum.

Eginognin hjá fyritokum má ti styrkjast, skal samfelagið fáa gagn av sínum menningarmoguleikum. Alternativið er vantandi menning ella miðsavnaður tapsváði. Hesum seinna hava vit, sum nevnt, ringar royndir av. Brúk verður ti helst fyri onkrum slag av partabrævamarknaði, har fyritokur kunnu útvega kapital við at skapa sær trúvirði. Spjaðingin í váða sæst tá aftur á tann hátt, at fyritokurnar verða meira sjálvstøðugar og lívførar.

Figgjaramboð

Ein av fylgjunum av, at figgjarmarknaðir alt meir eru vorðnir samanhangandi altjóða marknaðir, er, at tað er vorðið lættari at meta um og samanbera váða í ymsum londum. Hetta og menningin av teldutekni hevur gjort tað møguligt at gera figgjaramboð, sum kunnu brúkast til at minka um váða av samhandli, m.a. fyri broytingum í gjaldoyrakursum.

Ein av grundunum til, at okkara samhandil gongur so nógv gjognum Danmark og í donskum krónum, er helst at roynt verður at sleppa undan gjaldoyrakursbroytingum. Vórðu figgjaramboð brúkt til tess at tryggja móti kursbroytingum, hevði helst eisini verið lættari at broytt handilsmynstur til onnur lond.

2. LÝSING AV PENINGARENSLI TIL OG ÚR FØROYUM

2.1 Gjaldingar millum Føroyar og umheimin

Gjaldingar

Gjaldingar úr Føroyum til útlond og úr útlondum til Føroya verða framdar á ymsan hátt. Goldið kann verða kontant, við FR-korti, VISA-korti, kekki og øðrum.

Flytingarnar eru antin beinleiðis millum gjaldara og móttakara ella um peninga- og girostovnar. Føroyskir peninga- og girostovnar antin avgreiða ella luttaka beinleiðis í flestu gjaldingum, sum eru millum føroyingar og útlendingar.

Mett verður, at flytingarnar ella transaksjónirnar úr Føroyum liggja um 150 til 200 túsund í tali um árið. Flytingarnar til Føroya eru helst heldur færri.

Gjaldsjavnin

Peningarensl av landinum kann vera gjald fyri innfluttar vørur og tænastur, afturgjalding av uttanlandsláni, lønir hjá útlendingum í arbeiði í Føroyum, sum eru fluttar av landinum o.s.fr.

Flytingar til Føroya kunnu vera gjald fyri útfluttar vørur og tænastur, heimtøka av uttanlandsláni, lønir hjá føroyingum í arbeiði uttanlands, sum eru fluttar heim o.s.fr.

Hetta peningasamskifti millum føroyingar og útlendingar sæst aftur á føroyska gjaldsjavnanum. Gjaldsjavnin er ein uppgerð av virðinum av øllum búskaparligum samskifti, sum hevur verið millum ein búskap og umheimin eitt ávist tíðarskeið.

Gjaldsjavnin er ikki bert ein samanteljing av gjaldingum til og úr Føroyum. Í gjaldsjavnauppgerðini verður búskaparliga samskiftið flokkað eftir endamáli.

Fyrst og fremst verður skilt ímillum loypandi postar og kapitalpostar.

Loypandi postar eru hesir

- **Vørujavni**
  Útflutningur og innflutningur av vørum
- **Tænastujavni**
  Útflutningur og innflutningur av tænastum
- **Flytingarjavni**
  Rentuútreiðslur og rentuinntokur
  Tryggingargjald og -endurgjald
  Dividenda
  Lønir hjá føroyingum, sum arbeiða uttanlands
  Lønir til útlendingar, sum arbeiða í Føroyum
  Gávur
  Partur av yvirskoti frá danska tjóðbankanum
  Blokkstuðul og aðrar veitingar frá ríkiskassanum

Kapitalpostar eru hesir

- **Seðlaumfarið** (= krev mótvegis danska tjóðbankanum)
- **Ílagur hjá føroyingum í útlondum**
  Binding og loysing av peningi á konti í útlendskum peningastovnum

Keyp og sola av útlendskum lánsbrevum
Keyp og sola av útlendskum partabrevum
Kredittir

- **Íløgur hjá útlendingum í Føroyum**
  Binding og loysing av peningi á konti í føroyskum peningastovnum
  Keyp og sola av føroyskum lánsbrevum
  Keyp og sola av føroyskum partabrevum
  Kredittir
- **Upptøka og afturgjalding av kredittum og lánum hjá føroyingum uttanlands**
- **Lán til útlendingar úr Føroyum og afturgjalding av hesum lánum**

Yvirlitið yvir fyribrigdi á loypandi postum og kapitalpostum omanfyri er ikki fullfiggjað, men fevnir tó um teir týdningarmestu postarnar, sum verða viðgjørdir í hesum áliti.

Tá tosað verður um hall á gjaldsjavnanum verður meint við undirskot á loypandi postum. Hava Føroyar eitt ár havt hall á loypandi postum á gjaldsjavnanum, so er nettoskuld Føroya vaksin við sama tali ella nettoognin minkað samsvarandi.

Kapitalpostar vísa, hvussu hallið á gjaldsjavnanum verður figgjað ella avlopið investerað, og annars ávirkanir, sum hava staðist av virðisbroytingum á gjaldoyrum, lánsbrevum, skuldarbrevum v.m.

Pengarensl og gjaldsjavnin

Ein lýsing av peningarenslinum millum Føroyar og umheimin hevur verið roynd við føroyska gjaldsjavnanum í 1993 sum grundarlagi.

Talva 1 vísir eina seruppstilling av gjaldsjavnanum fyri Føroyar fyri árið 1993. Í talvuni verður roynt at lýsa og meta um bruttostreymar til og úr Føroyum. Viðmerkjast skal, at hetta ár stóðust óvanliga stórir bruttostreymar av almennari lántoku til bankabjarging og setan av avlopsgjaldføri hjá Føroya Banka frá bankabjargingini uttanfyri Føroyar. Tolini geva kortini greiða ábending um stórar flytingar millum Føroyar og útlond.

Skrásetingar á gjaldsjavna

Tá ið inntoka ella útreiðsla fer fram á loypandi postum, fer altið mótpostering fram á kapitalpostum. Verður t.d. vøra keypt í Danmark fyri 1.000 kr og goldin kontant, verða hesar posteringar gjordar:

Á vørujavna verða 1.000 kr útreiðslufordar og seðlaumfarið á kapitalpostum verður minkað við 1.000 kr. Í talvu 1 er seðlaumfarið bólkað undir "Kapitalpostar - annað". Seðlaumfarið eru føroysk krav mótvegis danska tjóðbankanum og hesi krav minka, tá ið útgangandi kontantgjalding fer fram.

Innflutningur fíggjaður við útvegarakreditti

Hugsast kann, at innflytari ikki rindar kontant, tá hann keypir, men fær kreditt frá donskum útflytara. Fyri gjaldsjavnan merkir hetta í fyrsta umfari, at uphæddin verður ført sum útreiðsla á loypandi postum og sum inntoka á kapitalpostum, ti kredittur verður tikin. Tá kreditturin verður afturgoldin, verða tvær stoddir á kapitaljavnanum ávirkaðar: Seðlaumfarið minkar 1.000 kr (inntokuføring) og skuldin minkar 1.000 kr (útreiðsluføring).

Vanliga verður ikki goldið kontant millum lond, men gjaldingarnar verða framdar um peningastovnar. Hetta kann lýsast við hesum dømi:

Vøra verður latin innflytara

Vit hugsa okkum ein handil, sum flytur inn vøru fyri 1.000 kr. Vøran verður figgjað við seljarakreditti og seinni goldin seljara, sum hevur konto í donskum banka, gjøgnum føroyskan peningastovn.

TALVA 1. GJALDSJAVNI FYRI FØROYAR OG UMHEIM Í 1993[1]

Mió kr	Útreiðslur	Inntøkur
Loypandi postar		
Vørujavni (sí talvu 5 og 6)	1.420	2.160
Tænastujavni (sí talvu 5)	690	295
Flytingarjavni (sí talvu 6-8)	1.225	1.600
Loypandi postar í alt	**3.335**	**4.055**
Kapitalpostar		
Beinleiðis ilogur		
- hjá føroyingum uttanfyri Føroyar	90	
- hjá útlendingum í Føroyum		
Gjaldingar v.v. figgjarskuld og -ogn		
Almennur sektorur (sí viðm. 2)	1.308	3.502
Peningastovnar (sí viðm. 3)	1.850	
Annað (sí talvu 4)	1.645	671
Kapitalpostar í alt	**4.893**	**4.173**

Viðmerkingar:

1. Uppgerðin umfatar ikki virðisbroytingar í sambandi við valutakursbroytingar, niðurskriving og avskriving av lánum o.t.
2. Útreiðslur á kapitalpostum hjá almenna sektorinum snúgva seg í 1993 í høvuðsheitum um lánsavdráttir, meðan inntøkur eru lántøka frá ríkiskassanum. Partur av nýggju lánunum fór til at gjalda avdráttir við, meðan stórur partur av restini umvegis Figgingargrunnin frá 1992 bleiv sett í Føroya Banka.
3. Útreiðslur á kapitalpostum hjá peningastovnum eru í høvuðsheitum farnar til niðurgjalding av skuld (uml. 800 mió kr) og til plaseringar í donsk lánsbrøv. Hesir streymar eru her roknaðir sum ogn við árslok, frádrigið ogn við ársbyrjan, og skuld við árslok, frádrigið skuld við ársbyrjan. Bruttostreymarnir viðvíkjandi ogn og skuld kunna tí sigast at hava verið størri enn vist í talvu 1, tí umleggingar/broytingar av ogn og skuld jú eisini fara fram í sjálvum tíðarskeiðnum frá 1.1.93 til 31.12.93.
4. Hesi tøl eru nett eftir kapitaljavnauppgerð hjá Hagstovu Føroya. Tølini byggja á broytingar frá ársbyrjan til árslok í ogn og skuld uttanfyri Føroyar hjá øllum øðrum sektorum enn peningastovnum og almenna sektorinum. Samanlegging av sektorum og uppgerðarháttur út frá statustølum primo og ultimo árið merkja, at vistu streymarnir eru undirmettir. Seðlaumfarið, sum eru føroysk krav mótvegis Danmarks Nationalbank, eru við í hesum posti.

Samskifti og skuldar- og ognarviðuskifti, sum verða stovnað og logd niður, kunna hugsast at vera hesi:

1) 1.000 kr verða útreiðslufordar á vørujavnanum, samstundis sum innflytari inntøkuførir 1.000 kr á kapitalpostum, tí hann hevur sett seg í skuld (fingið kreditt frá seljara).

Kredittur verður afturgoldin

2) Innflytari rindar kreditt aftur við at flyta seljaranum, sum hevur konto í donskum peningastovni, pengar av innlánskonto sínari í føroyskum peningastovni. Fyri innflytara merkir hetta broyting í ognar- og skuldarviðurskiftum í tveimum førum. Fyri tað fyrsta eigur hann minni til góðar hjá føroyska peningastovninum og síðani er skuldin til danska seljaran goldin aftur. Á kapitalpostum merkir hetta, at stuttfreistað uttanlandsskuld hjá føroyska innflytaranum er afturgoldin.

Avleidd viðskifti fyri peningastovn

3) Tað, at innflytari hevur flutt gjognum føroyskan peningastovn, merkir, at peningastovnurin sjálvur má dagføra kapitalpostarnar, tí broyting er hend í skuldar- og ognarstoðuni millum hann og danska peningastovnin.

Gjaldingarnar hjá føroyska peningastovninum kunnu fara fram á ymsan hátt. Hevur føroyski bankin kassakreditkonto (lines) hjá danska peningastovninum, sum innflytarin flytir pening til, verður kontoin hjá føroyska peningastovninum har skuldskrivað, tí kontoin hjá danska seljaranum er góðskrivað.

Fyri kapitaljavnan merkir hetta, at skuld hjá føroyska peningastovninum er økt við eini upphædd, sum svarar til tað, sum skuldin hjá innflutaranum er minkað. Men nettoskuldin hjá føroyska búskapinum er ikki broytt av hesi afturgjalding. Við øðrum orðum er tað hent, at skuldin hjá innflytara til seljara er burtur, men føroyski peningastovnurin hevur sett seg í skuld til danska peningastovnin.

Clearing millum peningastovnar

Mark er tó fyri, hvussu stóra skuld føroyski peningastovnurin við slíkum gjaldingum kann seta seg í. Hesi viðurskifti verða fyri tað mesta javnað við clearingsskipanum millum peningastovnarnar. Hetta kann antin fara fram í miðsavnaðari clearingsskipan í danska tjóðbankanum ella um sínámillum clearingsskipan.

Er kontoin hjá føroyska peningstovninum í danska peningastovninum farin upp um hámarkið, má hann gjalda niður skuld. Hetta kann td. gerast við, at føroyski peningastovnurin selur donsk lánsbrøv og nýtir gjaldførið, sum hann fær av søluni, til at fáa konto sína í danska peningastovninum í rættlag aftur.

Í hesum førinum minkar føroyski peningastovnurin um uttanlandsogn sína av lánsbrøvum og samstundis um uttanlandsskuld sína til danska peningastovnin, men hesar gjaldingar broyta ikki nettoskuld Føroya.

Vøru- og tænastuhandil ávirka ogn og skuld uttanlands

Omanfyri er roynt at vísa, hvussu útreiðslur á loypandi postum kunna elva til pengarensl á kapitalpostum. Gjaldingar verða í støran mun framdar um peningastovnar. Hetta ber í sær, at ogn- og skuldarviðurskifti ikki bert taka seg upp millum innflytara og útlendskan seljara, men eisini millum teir fíggjarstovnar, sum fremja gjaldingarnar. Líknandi viðurskifti gera seg eisini galdandi í samband við útflutning.

Aftrat hesum fara so eisini fram rørslur á kapitalpostum, sum ikki so beinleiðis hava samband við loypandi postar. Tað eru broytingar í samansetingini í ogn og skuld, sum millum annað hava til endamáls at minka um valuta- og renturisiko. Hesi viðurskifti verða viðgjord nærri í kapitli 5.

Lagt eigur at verða til merkis, at gjaldingar snúgva seg ikki bert um handil við vørum og tænastum, rentur og annað á loypandi postum, men eisini um gjaldingar á kapitalpostum, sum fevna um meira enn viðskifti, sum hava beinleiðis samband við loypandi postarnar á gjaldsjavnanum. Í talvu 1 sæst hetta av, at debet- og kreditumfar á loypandi postum ialt er um 7,4 mia kr, samstundis sum debet- og kreditumfarið á kapitalpostum er útivið 9 mia kr.

2.2 Gjaldingar millum Føroyar og Danmark

Í talvu 2 verður í hovuðstolum roynt at lýsa teir gjaldstreymar á loypandi postum, sum fara fram millum Føroyar og Danmark. Ógvuliga stórur partur av ollum viðskiftum hjá Føroyum við umheimin fer fram um Danmark. Talva 2 vísir, at føroyski búskapurin í 1993 hevði lutfallsliga stórt yvirskot á gjaldsjavnanum sum heild og lutfallsliga lítið yvirskot mótvegis Danmark.

TALVA 2. PENGARENSL MILLUM FØROYAR OG DANMARK - LOYPANDI POSTAR Á GJALDSJAVNA FYRI 1993

mió kr	Útlond í alt	Danmark
Útreiðslur	3.335	2.305
Inntokur	4.055	2.340
Yvirskot á loypandi postum á gjaldsjavna	720	35

Hugtakið yvirskot á gjaldsjavnanum skal brúkast við varsemi. Her er ikki talan um yvirskot í privat- ella virkisbúskaparligum týdningi. Yvirskot á gjaldsjavna merkir, at inngangandi streymar hava verið storri enn útgangandi, meðan yvirskot í privatbúskaparligum hopi er vinningur, avlop ella profittur.

Í talvunum 3 til 9 verður greitt nærri frá teimum rørslum, sum fara fram millum Føroyar og Danmark. Talvurnar eru greinaðar út úr teimum tolum, sum eru í talvu 1 og 2.

TALVA 3. SUNDURGREINING AV ÚTREIÐSLUM Á VØRUJAVNA Í TALVU 1

Voruinnflutningur í alt	1.422
Her av vorukeyp í Danmark	954
Herav vøra við Danmark sum upprunalandi	524
Vøra framleidd uttanfyri ríki, men keypt í Danmark	430

Talva 3 vísir, at umleið 2/3 av føroyska voruinnflutninginum fyri 1993 kom úr Danmark. Stív helvtin av innflutninginum haðani var eisini framleiddur í Danmark.

Spurt kann verða, hví føroyski búskapurin hevur knýtt seg so fast til danska búskapin, tá um innflutning ræður. Óivað hevur søguligt og mentunarligt tilknýti landanna millum nakað at siga. Hinvegin talar landafrøðiliga stoðan ikki fyri so stórum samskifti.

Danskar fyritøkur eru effektivar

At 2/3 av føroyska innflutninginum koma um Danmark, merkir, at danskar fyritøkur hava inntøkur av samhandlinum við Føroyar. Danskar fyritøkur, serliga í heilsuliðnum, bera orð fyri at vera effektivar og duga væl at veita tænastur. Tað kann vera ein týðandi grund til, at føroyingar keypa frá teimum. Hinvegin kann tað hugsast, at innflutningurin kundi fingist bíligari, leitaðu vit meir eftir vørum og tænastum í øðrum londum.

Viðmerkjast skal, at ein partur av vørum og tænastum, sum nýttar verða í Føroyum, kemur ikki við í innflutningshagtølini. Tað er serliga, tá danska sjóverjan keypir tilfar í Danmark til virksemi á føroyskum oki.

Í gjaldsjavnauppgerð fyri 1993 hevur hagstovan í sambandi við hendan post á flytingarjavnanum, roknað ríkinum eina útreiðslu uppá 125 mió kr. Útreiðslur til ríkissjúkrahúsið, 32 mió kr, og fyri føroyingar á stovnum undir andveikraverndini í Danmark, 19 mió kr, verða roknaðar sum keyp av tænastum og hoyra ti undir tænastujavnan. Meiri verður greitt frá hesum viðurskiftum undir talvunum 5, 6 og 7.

TALVA 4. SUNDURGREINING AV INNTØKUM Á VØRUJAVNA Í TALVU 1

Voruútflutningur í alt	2.160
Voruútflutningur til Danmark	560
Herav vøra har Føroyar eru upprunaland	560
Herav útflutt til Danmark, tó ikki framleitt í Føroyum	0

Tá talan er um útflutning av vørum úr Føroyum, visir seg eitt ikki so tætt tilknýti til Danmarkar sum í innflutninginum. Eins og talva 4 visir, fer bert 1/4 av voruútflutninginum til Danmarkar. Hartil kemur, at ein partur av ti útflutningi, sum er skrásettur at vera farin til Danmarkar, verður seldur viðari til onnur lond. Hetta er eitt nú galdandi fyri solu til goymslu hjá Faroe Seafood í Hirtshals.

TALVA 5. SUNDURGREINING AV TÆNASTUJAVNA Í TALVU 1

mió kr	Útreiðslur Innflutningur		Inntøkur Útflutningur	
	Øll lond	Danmark	Øll lond	Danmark
Trygging	91	0	25	0
Ferðing og flutningstænasta	250	150	200	150
Aðrar tænastur	350	300	70	50
Tænastur í alt	690	450	295	200

Tølini í tænastujavnanum í talvu 5 eru leysligar metingar, sum eru gjørdar í samband við hetta álit.

Trygging

Posturin trygging fevnir um endurtryggingargjald hjá føroyskum tryggingarfelagum og útgoldnar tryggingarupphæddir til føroysk tryggingarfelog frá útlendskum endurtryggingarfelagum. Inntokusíðan viðv. tryggingarpostinum er ógvuliga svingandi, alt eftir í hvønn mun skip og annar endurtryggaður kapitalur er fyri skaða.

Ferðing

Útreiðslur føroyinga til ferðing, sum er partur av postinum "Ferðing og flutningstænasta", verða fyri 1993 mettar at vera 150 mió kr til øll lond, og av teimum verða 2/3 mettir at fara til Danmarkar. Hinumegin verður mett, at útlendingar hava brúkt umleið 100 mió kr í sambandi við ferðing til Føroya. Av teimum hava danir brúkt 50 mió kr. Av hesum 50 mió kr vóru umleið 20 mió kr inntokur frá ferðandi, sum komu til Føroya at vitja skyldfólk.

Aðrar tænastur

Posturin "Aðrar tænastur" fevnir um umvælingar av føroyskum skipum uttanlands, umvælingar av útlendskum skipum í Føroyum, gjald frá føroyskum reiðaravirkjum fyri fiskirættindi, kunningar- og aðrar tænastur. Undir hesum posti eru eisini gjøld fyri heilsu- og almannatænastur, sum landskassin rindar donskum almennum stovnum. Størstu upphæddirnar her eru útreiðslur til ríkissjúkrahúsið (32 mió kr) og til evnaveik á stovni í Danmark (19 mió kr).

TALVA 6. SUNDURGREINING AV ÚTREIÐSLUM Á FLYTINGARJAVNA Í TALVU 1

mió kr	Útreiðslur		Inntekur	
	Øll lond	Danmark	Øll lond	Danmark
Lønir, vinningar vm.	100	75	145	125
Rentur	1.000	700	285	285
Danmarks Nationalbank	0	0	43	43
Danski staturin[1]	125	125	1.127	1.127
Flytingar í alt	1.225	900	1.600	1.580

Talva 6 vísir bruttostreymar millum Føroyar og umheimin, sum hava samband við flytingarjavnan. Sera stórur partur av øllum streymunum hevur samband við Danmark, serliga inntokumegin.

Lønir

Útreiðslur undir "Lønir, vinningar vm." eru mettar at verða 100 mió kr. Av teimum fara 75 mió kr til Danmarkar. Bólkarnir undir hesum posti eru:

- Útreiðslur til menningarhjálp, gávur (mett til 25 mió kr)
- Ferðaíkoyti til føroysk lesandi, stuðul til MFS, Hotel Tórshavn v.m. (mett til 15 mió kr)
- Lønir til útlendingar og aðrar veitingar (mett til 60 mió kr)

Inntokur undir "Lønir, vinningar vm." eru eftir tølum frá Toll- og Skattstovu Føroya mettar til 145 mió kr. Av teimum vóru lønir goldnar um DIS og FAS-skipanirnar til føroyingar umborð á útlendskum skipum 98 mió kr.

Rentur

Rentuútreiðslur eru roknaðar út frá eini miðalrentu uppá 8,8% pa. av bruttouttanlandsskuldini við árslok 1993, sum var 11,4 mia kr. Rentuinntøkurnar eru mettar út frá bruttoogn, sum var umleið 4,7 mia kr við árslok 1993 við miðalrentu uppá 6%. Tann parturin av rentuútreiðslunum, sum hevur samband við Danmark, er roknaður út frá tolum í talvu 7 sum lutfallið millum alla skuldina og skuld til Danmarkar. Sama útrokning er gjørd fyri rentuinntøkur.

Talva 7. Ogn og skuld uttanlands

ult. 93 mió kr	Øll lond	Danmark
Ogn	4.748	4.568
Skuld	11.403	6.826
Nettoskuld	6.655	2.258

Tjóðbankin

Posturin "Danmarks Nationalbank" í talvu 6 snýr seg um tann partin av avlopinum hjá danska tjóðbankanum, sum verður goldin ríkiskassanum, og sum landskassin fær part av. Landskassans partur verður roknaður eftir lutfallinum millum seðlaumfarið í Føroyum og seðlaumfarið í øllum ríkinum við árslok.

Ríkiskassin

Gjaldsjavnaposturin "Danski staturin" í talvu 6 er greinaður í talvu 8. Keldurnar eru roknskapir hjá ríkisstovnum fyri 1993.

Teigurin "Gjøld frá øðrum londum til ríkiskassan" undir postinum "Farvandsvæsenet" er flygging úr USA í sambandi við loranstøðina á Eiði. Viðurskifti av sama slag gera seg galdandi fyri "Flyvestation Thorshavn". Her veitir/veitti NATO ríkiskassanum 13 mió kr til at reka radarstøðina á Sornfelli. Inntøkur hjá ríkiskassanum undir postinum "Flogvøllur, Vágar" uppá 8 mió kr eru avgjøld frá flogfeløgum.

Ávirkan á virksemið í føroyska búskapinum

Tað er ymist, sum teir einstoku útreiðslupostarnir ávirka føroyska búskapin. Tað veldst um, hvussu bruttoútreiðslurnar hjá ríkiskassanum koma inn í føroyska búskapin. Tær kunnu býtast í triggjar bólkar eftir ti ávirkan, tær hava á framleiðsluvirksemið í føroyska búskapinum.

Rakstur av ríkisstovnum

Útreiðslur, sum beinleiðis elva til eftirspurning eftir arbeiðsmegi, vørum og tænastum, hava størstu ávirkanina á virksemið. Slíkar útreiðslur høyra til raksturin av ríkisstovnum. Týdningarmikið undantak er kortini sjóverjan, ti hennara lønir verða goldnar manning, sum býr í Danmark, og ti meginparturin av hennara tilfarsnýtslu verður fingin til vega úr Danmark.

Sambært roknskapartølum og tølum fyri lønargjaldingar um p/f Elektron vóru útreiðslur til lønir hjá ríkisstovnum í Føroyum 111 mió kr. Útreiðslurnar til keyp av vørum og tænastum vóru umleið 200 mió kr. Tann parturin, sum hevur týðuligastu ávirkanina á búskaparvirksemið, eru lønarútreiðslurnar. Mett verður, at raksturin av ríkisstovnunum umboðar 3-400 ársverk.

Verri er at meta um, hvørja ávirkan tilfarsnýtslan hevur á virksemið. Fyrst og fremst er hetta ein spurningur um, hvussu stórur partur av tilfarinum verður influttur. Verður roknað við, at tann innflutti parturin av tilfarsnýtsluni hjá ríkisstovnum samsvarar við innflutningskvotuna fyri búskapin sum heild, endar meir enn helvtin av tilfarsnýtsluni uppá 200 mió kr sum inntøka í ymsum vinnugreinum í føroyska búskapinum. Sostatt fáa útreiðslur til at reka ríkisstovnar avleidda ávirkan fyri virksemið í landinum.

Veitingar til landskassan

Útreiðslur ríkiskassans til landskassan hava minni beinleiðis ávirkan á virksemið. Tað er eisini nógv torfarið at meta um hesa ávirkan, bæði aftur eftir og frameftir. Spurningurin verður lýstur gjøllari í parti 2.3 og í næsta kapitli. Tó skal verða nevnt, at tað hevur týdning fyri virksemið, um landskassin beinir peningin frá ríkiskassanum inn í umfar í Føroyum ella ikki. Føroysku myndugleikarnir kunnu jú lata vera við at nýta blokkstuðulin. Ein slík uppsparing hjá landskassanum hevði minkað um eftirspurning hansara eftir arbeiðsmegi og tilfari.

Umlegging av stuðuli til heildarveiting

Fram til 1987 vórðu nógvar av ríkisins útreiðslum í Føroyum latnar sum endurgjald fyri útreiðslur, sum føroyskir myndugleikar høvdu sett í verk. Hendan skipan hevði óhepnar fylgjur fyri almenna útreiðslupolitikkin í Føroyum. Skipanin bar í sær ov lítið ansni hjá føroyskum politikarum við, hvat peningur bleiv brúktur til, tí ríkiskassin rindaði stóran part av gomlu og nýggju almennu útreiðslunum.

Síðani stuðulin varð umlagdur til heildarveiting, hava føroyingar fingið mest burturúr við at brúka peningin skynsamt.

TALVA 8. ÚTREIÐSLUR HJÁ RÍKISKASSA VIÐVÍKANDI FØROYUM

mió kr	Sala í Føroyum og gjald frá føroyingum	Gjald frá øðrum londum til ríkiskassan	Útreiðslur hjá ríkisstovni v.v. Føroyum	Nettoútreiðslur hjá ríkisstovnum v.v. Føroyum
Upphæddir undir flytingarjavna				
Føroya Rættur	10		9	-2
Sofartsstyrelsen			2	2
Farvandsvæsenet		7	12	5
Danm. Meteorolog. Inst.	0		4	4
Damn. Geolog. Inst.			1	1
Færoernes Kommando	1		14	13
Flyvestation Thorshavn		13	45	32
Fiskeriinspektionen			134	134
Fókakirkja, statpartur	0		8	8
Kriminalforsorgin			5	5
Rigspolitichefen	3		46	43
Regnskabsdirektoratet				
• heildarveiting			687	687
• endurgjøld			127	127
• pensiónir			9	9
Ríkisumboðið	0		5	5
Landslægekon	1		1	0
Flogvøllur, Vágar		8	17	9
Socialministeriet, krigsskaðaendurgjald			44	44
Bruttoinntøkur á gjaldsjavna í smh. við einvegis veitingar frá stati				**1.127**

Veitingar til húsarhald

Triðja slagið av ríkisútreiðslum í Føroyum eru veitingar til húsarhald. Tað eru eftirlønir til tænastumenn (9 mió kr) og krigsskaðaendurgjald, sum er nýggj útreiðsla hjá ríkiskassanum til Føroya. Upphæddirnar, sum goldnar eru føroyingum árini 1991-94 eru: 1991 (3,6 mió kr), 1992 (6,0 mió kr), 1993 (43,8 mió kr) og í 1994 (83,0 mió kr).

Útreiðslur av hesum slag ávirka ikki búskaparliga virksemið í Føroyum beinleiðis. Avgerandi eru nýtsla og uppsparing hjá teimum fólkum, sum fáa veitingarnar. Spara hesi fólk nógv upp, verður árinið á virksemið lítið - og øvugt.

Ikki skrásettar gjaldingar hjá ríkiskassanum viðv. Føroyum

Tøl úr roknskapinum hjá ríkiskassanum vísa, at ríkiskassin í 1993 hevði 1.083 mió kr í nettoútreiðslum av Føroyum. Í roknskapi landskassans fæst at vita, at ríkiskassin hevði 51 mió kr í inntokum av gjoldum landskassans fyri heilsu- og almannatænastur frá ríkisstovnum. Ríkiskassin hevur eisini aðrar útreiðslur av føroyingum, sum tó ikki verða gjørdar upp í stovnsroknskapum og hagtølum annars. Tað snýr seg serliga um útreiðslur til verju, pláss fyri føroyingum á útbúgvingarstovnum í Danmark og stuðul til føroyingar í útbúgvingarørindum í Danmark. Útreiðslur hjá ríkiskassanum til útbúgvingarstuðul kann metast at hava verið umleið 70 mió kr í 1993.

2.3 Hvussu ávirkast inntøkurnar í Danmark og Føroyum av samskiftunum landanna millum?

Handil og flytingar bera við sær inntøkugerð

Vøruhandil, tænastuhandil og inntøkuflytingar millum lond hava við sær virksemi og inntøkuskapan í báðum londum. Vanliga vinna báðir partar av handli - vinningur hjá øðrum nýtist ikki at mótsvara einum tapi hjá hinum partinum.

Millum Føroyar og Danmark fara fram peningaflytingar, ið ikki hava sum mótsvar veiting av vørum og tænastum. Talan er um gjaldingar frá statinum til blokkstuðul, refusiónir, krígsendurgjald og rakstur av statstovnum í Føroyum. Hesi serligu viðurskifti Føroya og Danmarkar millum hava givið fleiri orsøk til at seta fram hesa spurning: Hvussu ávirkast inntøkurnar í Danmark og Føroyum av samskiftunum landanna millum?

Tað ber í prinsippinum til at gera eina útrokning, ið sýnir:

- hvussu nógvar lønarinntøkur og vinnuligt avlop verður skapt í Føroyum av donskum gjaldingum til Føroya (føroyskur útflutningur til Danmarkar av vørum og tænastum og inntøkuflytingar so sum blokkurin, rentur av donskum obligatiónum í Føroyum o.s.fr.) og
- hvussu nógvar lønarinntøkur og vinnuligt avlop verður skapt í Danmark av føroyskum gjaldingum til Danmarkar (danskur útflutningur av vørum til Føroya, rentugjaldingar fyri føroyska skuld í Danmark o.s.fr.)

Rávøra, innflutningur og innlendsk inntøkuskapan

Keypa Føroyar vørur í Danmark fyri 1 mió kr, t.d. matvørur, so er hetta milliónin ikki rein lønarinntøka og vinnuligt avlop í Danmark. Fyri at framleiða fyri eina millión kr av matvørum, má framleiðarin keypa rávøru, herí eisini innflutta vøru. Tann innflutta vøran gevur ikki inntøku í Danmark. Hinvegin gevur rávøran, sum er keypt í Danmark, inntøkur til tær fyritøkur í Danmark, sum lata rávøruna til matframleiðararnar. Á sama hátt kann farast víðari til tær fyritøkur, sum lata vørur til tær fyritøkur, ið lata vørur til matframleiðararnar.

Niðanfyri er ein roynd gjørd at rokna ávirkanirnar av samhandlinum millum Føroyar og Danmark á inntøkuskapanina í báðum londunum fyri árini 1980, 1988 og 1993. Útrokningarnar kunnu óivað gerast upp á nógvar aðrar hættir, enn gjørt er niðanfyri.

Talan er um eitt roknidømi, og útrokningarnar eru fyrst og fremst ætlaðar at geva eina ábending um, hvat verður ávirkað av samhandlinum. Tey størstu fyrivarnini eru knýtt at tølunum í útrokningunum, so tey kunnu neyvan nýtast sum tey eru:

- Hóast upphæddirnar fyri Føroyar eru lutfalsliga sera stórar, verður í útrokningunum roknað "proportionalt". Hetta kann ein loyva sær í Danmark, har upphæddirnar eru sera smáar í mun til samlaða danska búskapin, men neyvan í Føroyum. Fall t.d. blokkstuðulin burtur, so hevði verið neyðugt við einum heilt broyttum vinnubygnaði í Føroyum. Allar framleiðslufortreytir høvdu verið broyttar, soleiðis sum umrøtt er aðrastaðni í hesum áliti.
- Danir hava fyrimun av, at føroyingar handla nógv gjegnum Danmark. Men harvið er ikki sagt, at føroyingar høvdu havt fyrimun av at handla uttan fyri Danmark. Vørurnar høvdu vit skula goldið í øllum førum. Hvørt tað er ein fyrimunur at handla uttan um Danmark veldst um, um prísirnir og vørudygdin eru betri uttan fyri Danmark, og um tað hevði havt aðrar kostnaðir við sær at handla uttan fyri Danmark.
- Í útrokningunum er stuðulin til føroysk lesandi í Danmark ikki við. Ein kundi tikið hesa upphædd við í blokkin. Hinvegin skapar nýtslan av stuðlinum stórt sæð bert inntøkur í Danmark, tí so at siga allur stuðulin verður nýttur í Danmark.
- Hartil skal leggjast, at útrokningarnar í stóran mun eru grundaðar á mett tøl fyri samskiftið millum Føroyar og Danmark, og á mett tøl fyri framleiðslumynstrið (input-output kvotur) fyri Føroyar. Heldur ikki fyri Danmark eru tølini lítaleys, tí input-output kvotumar, ið eru nýttar fyri oll árini 1980, 1988 og 1993, eru tær fyri 1992.

Input-output útrokningar

Tá ið ein skal rokna út ávirkanina á lønir, avlop o.s.fr. av, at ein vinna økir framleiðsluna, er talan um eina endaleysa ketu av keypum millum fyritøkur, sum tað kann tykjast vónleyst at gera sær eina greiða meting av. Tað ber tó kortini til við sonevndum input-output kvotum, ið finnast uppgjordar í talvum fyri danska búskapin. Hesar input-output kvotur sýna fyri hvørjar 100 kr, sum ein vinna framleiðir, hvussu nógv má 1) innflytast, 2) gjaldast í vøruskattum, 3) gjaldast í lønum og 4) gjaldast í vinnuligum avlopi fyri at framleiða fyri hesar 100 kr. Øll ketan av leveransum er roknað við í hesum input-output kvotum út frá einum serligum input-output modelli. Er talan um útflutning av matvørum kann ein sláa upp, at eitt framleiðsluvirði upp á 100 kr krevur 30 kr í innfluttum vørum, 35 kr í lønum og 46 kr í vinnuligum avlopi, tilsamans 111 kr. Av tí, at 11 kr verða latnar í vørustuðuli, kunnu útreiðslurnar til innflutning, lønir og avlop vera 111 kr.

Á sama hátt kann ein finna input-output kvotur fyri allar vinnugreinir, so ein kann rokna út, hvat árinið á lønargerð í privatu og almennu framleiðsluni er av samhandlinum míllum londini.

Í útrokningini er tikið við, at blokkstuðulin til Føroya hevur við sær eitt inntøkutap í Danmark, tí stuðulsupphæddin kundi verið nýtt til skattalækking, økta almenna nýtslu ella økkurt annað í Danmark. Her er inntøkutapið útroknað sum minking av almennari nýtslu í Danmark.

Tá ið árinið á inntøkugerðina í framleiðsluni er roknað út, er rímiligt eisini at rokna ávirkanina á inntøkugerðina, ið stendst av broyttari privatari nýtslu. Somuleiðis má roknast við, at almenna nýtslan ávirkast, tá ið skatturin broytist vegna inntøkugerðina í

framleiðsluni. Her er aftur talan um eina endaleysa ketu av inntøkubroytingum og fylgjandi nýtslubroytingum. Í útrokningini er oll ketan í prinsippinum roknað uppí.

Til at rokna ávirkanina á lonargerðina frá broytingini í privatu og almennu nýtsluni verða nýttar kvotur fyri privata nýtslu, privatar ilogur, almenna nýtslu, almennar ilogur og útflutning. Fyri allar hesar bólkar finnast kvotur fyri meira nágreiniligar undirbólkar.

Út frá bólkingini omanfyri kann ein sostatt við at nýta input-output kvoturnar rokna út, hvat verður skapt av lonarinntøkum og vinnuligum avlopi av samskiftinum millum Føroyar og Danmark, grundað á føroyska gjaldsjavnan mótvegis Danmark.

Danski útflutningurin til Føroya verður flokkaður í bólkar, sum input-output kvotur finnast fyri. Til vorur, ið ikki eru av donskum uppruna, men sum verða seldar til Føroya gjognum danskan millumhandlara, verða kvoturnar fyri heilsølur nýttar, grundað á vinningin av at selja vorurnar. Fyri tænastur verður farið fram á sama hátt: kvoturnar fyri ferðing verða nýttar til ferðing føroyinga í Danmark, kvoturnar fyri flutningsvirkseminum verða nýttar til flutningsútreiðslurnar hjá føroyingum til Danmarkar, og fyri aðrar tænastur verða kvoturnar fyri hovuðsbólkin "Privatar tænastur" nýttar. Danskar lønir og vinningsbýti úr Føroyum verða ikki roknaðar at hava annað við sær enn reina inntøku. Lonargerðin av føroysku rentugjaldingunum til Danmarkar verður roknað, eftir at kostnaðurin av tí kapitalbinding, sum krevst í Danmark fyri at kunna veita føroyingum lán, er drigin frá.

Føroyskar input /output-kvotur

Hovdu vit havt input-output kvotur fyri Føroyar, eins og Danmark hevur, høvdu vit á sama hátt kunnað roknað okkum fram til, hvat verður skapt av lønum og vinnuligum avlopi í Føroyum av inntokum, sum Føroyar hava av samskiftinum við Danmark. Tað hava vit tíverri ikki, men vit hava kortini roynt at sett eina útrokning upp við at nýta tær donsku input-output kvoturnar tilrættaðar, so ein betri kann siga, at tær svara til føroysk viðurskifti. Í høvuðsheitum er innflutningskvotan økt við 100% í mun til ta donsku. Kvoturnar fyri lønir og vinnuligt avlop eru lækkaðar samsvarandi.

Í Føroyum fer tiskil ein storri partur enn í Danmark av hvørjari framleiðslukrónu til innflutning, meðan ein minni partur fer til lønir og vinnuligt avlop.

Út frá hesum fortreytum kann ein (grundað á tær donsku input-output kvoturnar) rokna inntokuskapanina í Føroyum av donskum gjaldingum til Føroya á sama hátt, sum ein roknar inntokuskapanina í Danmark av gjaldingum úr Føroyum. Tó er blokkstuðulin eitt serføroyskt fyribrigdi, sum ein má viðgera fyri seg. Í útrokningini verður roknað við, at økist eila minkar blokkurin við t.d. 100 kr, so býta hesar 100 kr seg upp á vanligan almennan rakstur, almennar ilogur og veitingar í sama lutfall, sum landskassaútreiðslurnar eru býttar upp á bólkar. Fyri hvønn av hesum bólkum finnast input-output kvotur, sum kunnu nýtast í útrokningini.

Beinleiðis inntøkuávirkanir

Í skjalunum 1-3 er henda útrokning sett upp, grundað á gjaldsjavnan fyri 1980, 1988 og 1993:

- súla 2 í hesum skjalum sýnir skrásettu føroysku gjaldingarnar til Danmarkar.
- súla 3 sýnir tær inntokurnar, ið verða skaptar í Danmark av upphæddunum í súlu 2.
- súla 4 sýnir skrásettu donsku gjaldingarnar til Føroyar.

- súla 5 sýnir tær inntokurnar, ið skaptar verða í Føroyum av upphæddunum í súlu 4.

Av talvuni fyri 1993 (skjal 3) sæst:

- Vøruútflutningur úr Føroyum til Danmarkar upp á 560 mió kr, hevur við sær inntokur í Føroyum upp á 478 mió kr. Danskur útflutningur til Føroya upp á 525 mió kr av donskum upprunavørum og 430 mió kr av vørum, ið ikki eru framleiddar í Danmark, hava við sær inntokur í Danmark upp á 461 mió kr, herav stava 359 mió kr frá vørum framleiddar í Danmark.
- Tænastuhandilin hevur við sær inntokur upp á 35 mió kr í Føroyum, meðan 244 mió kr verða skaptar í Danmark.
- Inntokuflytingarnar, ríkisstuðulin íroknaður, skapa 1.026 mió kr í inntokum í Føroyum, meðan tær skapa 298 mió kr í Danmark. Í Føroyum er tað sjálvandi blokkstuðulin, sum serliga skapar inntokur upp á 776 mió kr, meðan tað serstakliga eru rentugjaldingarnar til Danmarkar, ið skapa inntokur í Danmark. Tað inntokutapið, sum ríkisstuðulin elvir til í Danmark, eigur eisini at roknast uppi, og tað er roknað út til 761 mió kr.
- Samlaða úrslitið fyri skapan av framleiðslulonum og avlopum av samskiftinum millum Føroyar og Danmark í 1993 er tískil í fyrstu atlogu, at 1.539 mió kr í inntokum verða skaptar í Føroyum móti 242 mió kr í Danmark.

Tað, sum verður umrøtt omanfyri, fevnir bert um inntokur, sum eru skaptar í framleiðsluni. Enn restar í at rokna út, hvussu nógv inntøka verður skapt, tá ið hesar inntokur verða brúktar av teimum, ið fáa inntokurnar. Inntokurnar verða tó bert partvíst nýttar, ti fyrst fer skattur av, síðani verður nakað spart upp. Hinvegin kann ein rokna við, at tær oktu skattainntokurnar elva til stórri almennar útreiðslur.

Henda útrokning er gjørd í niðastu reglunum í skjali 3, har tað sæst, at tær 1.539 mió kr, sum í Føroyum verða skaptar av samhandlinum, hava við sær, at 555 mió kr aftrat verða skaptar í inntoku vegna økta privata nýtslu og 598 mió kr vegna økta almenna nýtslu. Í Danmark hava tær 242 mió kr í inntoku frá samskiftinum við sær, at 186 mió kr aftrat verða skaptar í Danmark av privatari nýtslu og 152 mió kr av almennari nýtslu. Samanlagt verða í 1993 tískil 2.692 mió kr skaptar í Føroyum og 579 mió kr í Danmark.

Hyggur ein at, hvaðani inntokugerðin stavar, er í skjali 3 roknað út, at av inntokugerðini í Føroyum í 1993 upp á 2.692 mió kr stava 1.359 mió kr frá ríkisstuðlinum, meðan 1.334 mió kr stava frá øðrum samskifti við Danmark. Inntokugerðin í Danmark er roknað út til 579 mió kr í 1993. Hetta er eitt nettotal, sum fjalir yvir, at ríkisstuðulin hevur við sær eitt inntokutap í Danmark upp á 1.823 mió kr, meðan annað samskifti við Føroyar hevur við sær inntokur upp á 2.402 mió kr. Í 1993 er bruttotjóðarúrtakan (BTÚ) í Føroyum mett til knappar 5 mia kr. Sambært útrokningunum er inntokugerðin av ríkisstuðlinum 1.359 mió kr, te. ca. 27% av BTÚ stava frá ríkisstuðlinum.

Nú var 1993 eitt rættiliga óvanligt ár, ti føroyska kreppan var í hæddini. Tí eru útrokningar eisini gjørdar fyri 1980, har samlaða føroyska gjaldsajavnahallið var lítið, og fyri 1988, har gjaldsjavnahallið var metstórt. Hovuðsúrslitini fyri oll trý árini 1980, 1988 og 1993 eru víst í talvu 9.

TALVA 9. INNTØKUSKAPAN Í FØROYUM OG DANMARK AV SAMSKIFTINUM MILLUM BÆÐI LONDINI

mió kr	1980 Inntøkugerð		1988 Inntøkugerð		1993 Inntøkugerð	
	í Danmark	í Føroyum	í Danmark	í Føroyum	í Danmark	í Føroyum
Vørujavni	491	156	974	371	461	478
Tænastujavni	205	34	502	21	244	35
Flytingarjavni	39	393	659	829	298	1.026
herav:						
lønir	*22*	*95*	*500*	*95*	*75*	*125*
rentur	*17*	*8*	*159*	*76*	*223*	*86*
ríkisstuðul	*0*	*273*	*0*	*615*	*0*	*776*
Bruttoinntøkugerð áðrenn avleidda nýtslu	735	583	2.136	1.222	1.003	1.539
Inntøkutap í DK av stuðli	-267		-603		-761	
Nettoinntøkugerð áðrenn avleidda nýtslu	468	583	1.533	1.222	242	1.539
Avleiddar inntøkur av privatari og alm. nýtslu	653	437	1.833	1.051	337	1.154
Tilsamans	**1.120**	**1.021**	**3.366**	**2.272**	**579**	**2.692**
herav						
frá ríkisstuðli	-640	477	-1.324	1.145	-1.823	1.359
ikki frá ríkisstuðlinum	1.761	544	4.690	1.128	2.402	1.334
Føroyskt gjaldsjavnaavlop mótvegis Danmark		-506		-1.678		35
BTÚ í Føroyum		2.507		6.421		4.954

Tað sæst í næstniðastu linju í súlu 3, 5 og 7, at føroyska gjaldsjavnaavlopið mótvegis Danmark var -506 mió kr í 1980 (í 1980 var samlaða gjaldsjavnahallið mótvegis útheiminum annars hert 77 mió kr), -1.678 mió kr í 1988 og +35 mió kr í 1993. Talvan vísir eisini, at í 1980 vóru skaptar 99 mió kr meira í lønum í Danmark enn í Føroyum av samhandlinum, í 1988 1094 mió kr meira í Danmark og í 1993 2113 mió kr meira í Føroyum enn í Danmark.

Skiftandi inntøkuskapan

Javnvágin í lønarskapanini landanna millum er sostatt ógvuliga skiftandi. Inntøkugerðin í Føroyum av samskiftinum við Danmark hevur tó verið rættiliga stoðugt vaksandi. Serstakliga skapar blokkstuðulin hvort árið rættiliga nógvar lønir í Føroyum. Tað sum fyrst og fremst ger, at javnvágin er skiftandi er, at tað hevur verið skiftandi hvussu nógvar vørur og tænastur Danmark hevur keypt úr Føroyum, hvussu nógvar lønir eru goldnar donum í Føroyum, hvussu nógv føroyingar ferðast í Danmark og at enda hvussu stór lán Føroyar hava í Danmark. Handilsmynstrið kann sostatt hava við sær, at fleiri lønir kortini verða skaptar í Danmark enn í Føroyum.

Uppgerðin fyri 1988 vísir, at bóast tann danski prosentparturin av tí føroyska innflutninginum er minni enn í 1980, so hevur veksturin í ti samlaða innflutninginum av bæði vørum, tænastum og arbeiðsmegi við sær, at væl meira av lønum verða skaptar í Danmark enn í Føroyum av samhandlinum landanna millum. Í 1993 er vend komin í, tí nú er innflutningurin sum heild á so lágum stoði, at bert fáar inntøkur verða skaptar í

Danmark av føroyskum keypi. Í 1980 stavaðu 19% av BTÚ í Føroyum frá ríkisstuðlinum og í 1988 var parturin 18%.

Niðurstøðan, sum kann dragast er sostatt, at blokkstuðulin gevur eitt munandi íkast til lønarinntøkur í Føroyum og ovugt eitt inntøkutap í Danmark, men at føroyska handils- og figgingarmynstrið - t.e. innflutningur, útflutningur, rentur o.s.fr. til og úr Danmark - er avgerandi fyri um meira verður skapt av lønum í Danmark enn í Føroyum. Hetta kann sigast um okkara samskifti við øll lond - tó hava vit tann fyrimun, tá ið tað snýr seg um Danmark, at vit fáa blokkstuðulin.

Sum nevnt í inngangsins til brot 2.2, so skulu tey útroknaðu tølini lesast við størstu fyrivarnum. Tey kunnu helst nýtast til at geva eina ábending um, hvørji árin samskiftið landanna millum hevur á hvørt landið sær, men neyvan til at siga nágreiniliga hvussu stórt hetta árinið er.

2.3 Samandráttur

Hugtakskarmur

Peningarrensl millum Føroyar og umheimin verður í hesum áliti lýst við gjaldsjavnanum sum kann um hugtakið. Hetta merkir, at peningarrensl ikki bert umfatar ítøkiligar gjaldingar við seðlum og myntum millum føroyingar og útlendingar, men eisini onnur slag av flytingum sum slíkar verða allýst í gjaldsjavnanum sum hagfrøðiligari skipan.

Føroyar hava ein opnan búskap

Føroyar hava ein ógvuliga opnan búskap. Á løypandi postum á gjaldsjavnanum fyri 1993 kom hetta til sjóndar á tann hátt, at inntøkurnar svaraðu til 83% av BTÚ og útreiðslurnar 69% av BTÚ. Virðið á inn- og útgangandi rørslum á løypandi postum tilsamans var 7,3 mia kr. Rørslurnar í sambandi við ogn og skuld uttanlands, kapitalpostarnir, eru hetta sama árið mettar til góðar 9 mia kr.

Settur er upp gjaldsjavni mótvegis Danmark, ið byggir á mett tøl fyri gjaldsjavnan sum heild fyri árini 1980, 1988 og 1993. Hóast rættiliga stór óvissa er á ávisum økjum á gjaldsjavnauppgerðini mótvegis Danmark, er eyðsýnt, at samskiftið við Danmark er lutfallsliga stórur partur av gjaldsjavnanum sum heild.

Stóru gjaldsstreymarnir millum Danmark og Føroyar á kapitalpostum, sum hesir koma til sjóndar í gjaldsjavnauppgerðini fyri 1993, hava samband við, at føroyingar hava næstan alla sína bruttoogn og væl meir enn helvtina av bruttoskuldini í donskum krónum. Valið hjá føroyingum av valutasamanseting av figgjarogn og -skuld er eitt nú treytað av vana og valutakursváða.

Stóru gjaldsstreymarnir við Danmark á løypandi postum stava serliga frá innflutningi, rentum og veitingum frá ríkiskassanum

Inntøkugerð í Føroyum og Danmark

Ymisk slag av gjaldingum eru millum Danmark og Føroyar á løypandi postum og tær verða umroddar eftir hvørja ávirkan tær hava á virksemið í Føroyum og í Danmark. Roynt hevur í hesum kapitli verið at seta tøl á hesar ávirkanir við sokallaðari input-output útrokning fyri árini 1980, 1988, 1993

Tølini í uppgerðini kunnu ikki nýtast beinleiðis, men bert til at vísa nakað um hvørjar ávirkanir eru av samskiftinum landanna millum.

Uppgerðin visir, at samskiftið við Føroyar hevur bæði positivar og negativar inntøkuávirkanir í Danmark. Gjaldingarnar fyri danskan útflutning av vørum og tænastum til Føroya skapa inntøkur í Danmark, meðan ríkisstuðulin til Føroya minkar um inntøkuskapanina í Danmark. Í Føroyum skapar útflutningurin til Danmarkar inntøkur í Føroyum, eins og ríkisstuðulin skapar inntøkur í Føroyum.

Inntøkugerð í 1993

Inntøkugerðin í Føroyum av samskiftinum við Danmark var í 1993 2,7 mia kr, meðan inntøkugerðin í Danmark av samskiftinum við Føroyar var í 1993 0,6 mia kr. Sum nevnt omanfyri eiga hesi tøl at verða brúkt við fyrivarni. Í Føroyum stavaðu 25-30% av BTÚ ella 1,4 mia kr av inntøkugerðini frá ríkisstuðlinum og 1,3 mia kr frá øðrum samskifti við Danmark. Í Danmark kemur inntøkugerðin upp á 0,6 mia kr fram sum úrslit av 1,8 mia kr í inntøkutapi vegna ríkistuðulin til Føroyar og 2,4 mia kr í inntøkugerð frá øðrum samskifti við Føroyar.

1993 var tó eitt rættiliga óvanligt ár. Í 1993 hevdu Føroyar 35 mió kr í gjaldsjavnaavlopi mótvegis Danmark. Fíggjarkreppan í 1992-94 var so ógvuslig, at føryingar steðgaðu bæði neyðugum og óneyðugum keypi. Tí er roynt eisini at gera útrokningarnar fyri 1980, tá ið hallið á gjaldsjavnanum var lítið, og fyri 1988, tá ið gjaldsjavnahallið var sera stórt.

Inntøkugerð í 1980

Hóast samlaða gjaldsjavnahall Føroya var lítið í 1980, so var handilsmynstrið soleiðis, at hallið mótvegis Danmark var 0,5 mia kr (soleiðis hevur helst verið vanligt undan 1980). Inntøkugerðin í Føroyum av samskiftinum við Danmark var 1,0 mia kr, herav stavaðu 0,5 mia kr (ella knapp 20% av BTÚ) frá ríkisstuðlinum. Inntøkutapið í Danmark av ríkisstuðlinum var 0,6 mia kr meðan inntøkugerðin av samhandli var 1,8 mia kr. Netto var inntøkugerðin í Danmark í 1980 1,1 mia kr av samskiftinum við Føroyar.

Inntøkugerð í 1988

Í 1988 var gjaldsjavnahall Føroya mótvegis Danmark 1,7 mia kr. Inntøkugerðin í Føroyum var 2,3 mia kr, herav stavaðu 1,1 mia kr (ella knapp 20% av BTÚ) frá ríkisstuðlinum. Inntøkutapið í Danmark av ríkisstuðlinum var 1,3 mia kr, meðan inntøkugerðin av samhandli var 4,7 mia kr. Netto var inntøkugerðin í Danmark í 1988 3,4 mia kr av samskiftinum við Føroyar.

Hesi tøl skulu sum nevnt nýtast sera varisliga, men tey vísa, at samhandil hevur alstóran týdning fyri virksemið í hesum londum. Sigast kann, at danir hava ágóða av, at stórur eftirspurningur er í Føroyum, sum t.d. í 1988. Hinvegin rakar tað eisini danskar fyritøkur, tá ið búskaparlig afturgongd er í Føroyum, sum t.d. í 1993.

Uppgerðin sigur ikki nakað um, hvort tað er skilagott hjá føroyingum at handla í Danmark ella ikki. Hvort tað hevði loyst seg heldur at samhandla við onnur lond veldst um pris, vørudygd, kostnaðir av at handla við onnur o.s.fr. Tølini vísa hinvegin, at samskiftið millum Føroyar og Danmark ávirkar framleiðslu, privata nýtslu og almenna nýtslu í báðum londum. Hetta kann sigast um okkara samskifti við øll lond - tó hevur føroyski búskapurin fyrimun av einvegis ríkisveitingunum, tá ið tað snýr seg um Danmark.

Tað er umráðandi at gera vart við, at uppgerðin ikki sigur stórvegis um langtíðarávirkaniuar á føroyska búskapin av ríkisstuðlinum. Skal ein siga nakað um langtíðarávirkanir, er neyðugt at meta um allar tillagingar, sum hovdu staðist av broytingum í stuðlinum. Hesar langtíðarávirkanir eru nærri viðgjørdar í kapitli 3.

3. VEITINGAR ÚR RÍKISKASSANUM OG ÁVIRKAN Á FØROYSKA BÚSKAPINUM

3.1 Ávirkan av ríkisveitingum á tøka bruttotjóðarinntaku og framleiðslu Føroya

Hugtøk úr tjóðarroknskapinum

Vanliga kann eitt land stórt sæð bert brúka so mikið av vørum og tænastum til nýtslu og ílogur, sum tað sjálvt klárar at framleiða. Við øðrum orðum kann ein normalur búskapur hava ein innlendskan eftirspurning (IE) sum svarar umleið til bruttotjóðarúrtøkuna (BTÚ) og tøku bruttotjóðarinntøkuna (tBTI). Hesar grundleggjandi støddir í tjóðarroknskapinum, bruttotjóðarúrtøka (BTÚ), innlendskur eftirspurningur (IE) og tøk bruttotjóðarinntøka (tBTI) eru fyri flestu lond á nøkulunda somu stødd. Frávikini eru sjáldan meira enn nokur fá prosent, og stava tá frá undir- ella yvirskoti á gjaldsjavnanum.

Eftirspurningskomponentar

Virðið á ti, sum føroyski búskapurin framleiðir í einum tíðarskeiði (einum ári) - bruttotjóðarúrtøkan - er sett saman av hesum eftirspurningspørtum:

- C_t - sum er útreiðslur hjá privata sektorinum til tann partin av nýtsluni, ið er framleiddur í føroyska búskapinum
- I_t - sum er útreiðslur hjá privata sektorinum til tann partin av ílogunum, ið er framleiddur í Føroyum
- G_t - sum er eftirspurningur hjá ti almenna eftir innlendskari framleiðslu. Eftirspurningurin hjá ti almenna kann eins og fyri tann privata sektorin greinast sundur í eftirspurning til nýtslu og ílogur, men hetta verður ikki gjørt í hesum samanhangi.
- X_t - sum er útflutningvirði Føroya av vørum og tænastum, frádrigið virðið av ti innflutningi, sum farin er til at framleiða útflutningin[1].

Framleiðslan (BTÚ)

Bruttotjóðarúrtøkan kan tí lýsast við fylgjandi:

1) $BTÚ = C_t + I_t + G_t + X_t$

har minkaða I-ið eftir C, I, G og X vísir til innlendska framleiðslu. Sera trupult er tó at gera upp, hvussu stórur partur av nýtsluni, ílogunum og øðrum eftirspurningarpørtum er innlendskt framleiddur, og ti verður framleiðslan í sambandi við tjóðarroknskap sett soleiðis upp:

2) $BTÚ = C + I + G + X - M$

har C stendur fyri samlaðu privatu nýtsluna, tvs. bæði tí partinum av nýtsluni, sum er framleiddur í Føroyum og tí partinum, sum stavar frá framleiðslu í umheiminum. Fyri I, G og X er tað sama galdandi. M stendur fyri føroyska innflutninginum av vørum og tænastum, sum jú er partur av C, I, G, og X, og virðið á innflutninginum (M) skal tí dragast frá hinum eftirspurningarpørtunum fyri at gera upp BTÚ.

Innlendskur eftirspurningur (IE)

Útflutningurin (X) er útlendskur eftirspurningur eftir framleiðslu úr føroyska búskapinum, meðan innlendski eftirspurningurin er:

---

[1] Vanligur notatiónsformur í samband við eftirspurningspartar er nýttur her, har C stavar frá "consumer goods", I stendur fyri "investments", G fyri "government expenditures" og X fyri "exports of goods".

3) IE = C + I + G

Við øðrum orðum sigur innlendski eftirspurningurin (IE) okkum, hvat føroyski almenni og privati sektorurin hevur keypt av vorum og tænastum úr Føroyum og útheimi til nýtslu og ilogur í einum ári.

Innlendski eftirspurningurin hevur øll árini í tíðarskeiðnum frá 1962, tá byrjað varð at seta upp tjóðarroknskapir fyri Føroyar, og fram til 1989 verið størri enn bruttotjóðarúrtøkan. Frá og við 1990 og til í ár - 1996 - hevur verið øvugt. Innlendski eftirspurningurin hevur verið minni enn framleiðslan.

Tøk bruttotjóðarinntøka (tBTI)

Men føroyingar hava kunnað brúkt væl meira enn framleitt hevur verið, uttan at skuldarbinda búskapin. Hetta lat seg gera við einvegis veitingum úr ríkiskassanum til Føroyar. Føroyingar kundu keypa meira úr umheiminum, enn teir seldu til umheimin, uttan at tað nýttist at hava við sær undirskot á loypandi postum á gjaldsjavnanum og harvið lántoku uttanfyri Føroyar. Hetta tí, at gjaldsjavnin jú ikki bert snýr seg um innflutning og útflutning av vorum og tænastum, men eisini gjaldingar, ið viðvíkja kapitalavkasti (rentur og dividendu til/úr Føroyum) og einvegis veitingum. Vit kunna í hesum samhangi lýsa gjaldsjavnan sum settan saman av 3 bólkum av gjaldingum:

Gjaldsjavnahall (GJ)

4) GJ = XM + NRL - NV

Har

- GJ stendur fyri halli á loypandi postum á gjaldsjavnanum
- XM stendur fyri *halli* á voru- og tænastujavnanum, tvs. innflutningur minus útflutning
- NRL stendur fyri nettogjaldingum *úr* Føroyum í samband við rentur, dividendu og lønir og
- NV stendur fyri nettogjaldingum í samband við einvegis gjaldingar *til* Føroya, tvs. veitingar úr ríkiskassanum.

Vit hugsa okkum sum útgangsstoði, at NRL = 0. Hetta er td. galdandi við ongari (lítlari) nettoskuld til útlond, og tá ið lønir til útlendingar í Føroyum javnviga við lønir til føroyingar, sum arbeiða í útlondum. Í slíkari stoðu kann likning 4) skrivast soleiðis:

5) GJ = XM + 0 - NV = XM - NV

Samanhangur millum tBTI, BTÚ og GJ

Tvs., at føroyski búskapurin kann hava javnvág á loypandi postum á gjaldsjavnanum (GJ=0), um undirskot á voru- og tænastujavna (XM) ikki er størri enn veitingarnar úr ríkiskassanum (NV). Ella sagt við øðrum tjóðarroknskaparhugtokum: Toka bruttotjóðarinntokan (tBTI) er á sama stigi sum innlendski eftirspurningurin (IE), har tok bruttotjóðarinntoka verður allýst sum:

6) $tBTI = BTÚ + NV$

cila

7) $tBTI = IE - XM + NV = IE - GJ$[2]

Ein slík javnvág var í hovuðsheitum í føroyska búskapinum í tíðarskeiðinum 1962 til 1974. Toka bruttotjóðarinntokan var nokulunda líka stór sum innlendski eftirspurningurin, og javnvág var stórt sæð á loypandi postum á gjaldsjavnanum[3]. Í miðal svaraði stuðulin úr ríkiskassanum hesi ár til 12% av BTÚ. Nettolántoka uttanlands av týdningi varð ikki, og ti kann ávirkanin upp á stutt og millumlangt sikt á føroyska búskapin í ávisan mun lýsast á sama hátt, sum danski búskaparfrøðingurin Martin Paldam hevur lýst grønlendska búskapin.

Yvirføring av analysu hjá Paldam til føroyskan búskap

Hugsanin hjá Paldam er í hovuðsheitum henda. Stuðul úr ríkiskassanum verður veittur fyri at toka bruttotjóðarinntokuna pr. fólk í Føroyum skal koma upp á nokulunda sama stig sum í Danmark. Hetta hevur verið góðtikið politiskt frá danskari síðu, ti Føroyar eru partur av danska ríkinum og hava ti í ávisan mun "rætt til" ein livifót, sum ikki er nógv lægri enn í Danmark. Í hesum sambandi er helst eisini rætt, sum sagt verður í bóklingi hjá Paldam, at politiskt hevði Danmark ikki kunnað veitt Føroyum (og Grønlandi) stuðul, um toka bruttotjóðarinntokan pr. fólk var hægri í Føroyum (og/ella Grønlandi) enn í Danmark.

Veitingin hevur havt við sær, at føroyingar hava havt "ráð" til ein innlendskan eftirspurning, sum var størri enn framleiðslan. At føroyingar hava havt ráð til at brúka meira, enn teir sjálvir hava framleitt, merkir ikki nøðturviliga, at teir skuldu gera tað, ti ráðini kundu verið nýtt til at byggja upp nettoogn uttanfyri Føroyar ella til at gjalda niður skuld. Í sama tíðarskeiði (1962-74) hava føroyingar tó valt at hava ein innlendskan eftirspurning, sum framleiðslan og ríkisveitingarnar kundu fíggja, tvs. at innlendski eftirspurningurin var á nokulunda sama stigi sum toka bruttotjóðarinntokan.

Um hvussu NV verður til effektivan eftirspurning

Ymisk viðurskifti gjørdu, at veitingarnar hovdu við sær størri innlendskan eftirspurning. Politiskt var ringt at minka um keypsorku hjá privata sektorinum við skattum og avgjøldum, tá ið almennu útreiðslurnar í Føroyum í stóran mun kundu fíggjast av donskum skattgjaldarum, og føroyingar ynsktu eina útbygging av vælferðarsamfelagnum eins og í londunum rundan um okkum við hartil hoyrandi útreiðslum, serliga til samferðslu, útbúgving, heilsurokt og almannamál. Veitingarnar fingu gjognum tann almenna (tann danska og føroyska) útreiðslupolitikkin ávirkan á innlendska eftirspurningin - eftirspurningarpartarnir C, I, G vuksu.

Ríkisveitingarnar hovdu við sær, at toka bruttotjóðarinntokan varð størri enn annars, men eisini er sannlíkt, at framleiðslan er varðin øðrvísi og helst eisini størri enn uttan stuðulin. Samanhangir millum ríkisveitingar, toka bruttotjóðarinntoku og bruttotjóðarframleiðslu kunnu í hovuðsheitum lýsast soleiðis fyri tíðarskeiðið 1962 - 74.

---

[2] NB! NRL er í hesum dømi 0

[3] Akkumuleraða halli/yvirskotið á gjaldsjavnanum fyri hetta tíðarskeið var 8 mió. kr og tí var nettouttanlandsskuldin sum prosentpartur av tBTI ikki vaksin. Uml. 1974 var hon umleið 0.

Talva 10, linja 3, 4 og 5 vísa, at føroyska framleiðslan kann greinast í tveir partar. Ein part, sum búskapurin skapar uttan veitingar úr ríkiskassanum og ein part, sum beinleiðis og óbeinleiðis stavar frá ríkisveitingunum.

Multiplikator viðv. ríkisveitingum

Mangan hevur verið spurt, hvør multiplikatoreffektin í samband við ríkisveitingarnar er. Við øðrum orðum verður spurt um, hvussu nógvar miliónir kr føroyska bruttotjóðarúrtakan veksur, um ríkisveitingar vaksa 1 mió kr. Í talvuni eru sett upp trý hugsað dømi viðv. multiplikatoreffekt av ríkisveitingum. Í dømi 1 verður mett, at ríkisveitingar, sum svara til 12% av BTÚ, bert økja framleiðsluna 6%. Multiplikatorávirkanin kann tí roknast at verða 0,5, ella sagt við vanligum orðum: um veitingar vaksa 1 mió kr, so veksur BTÚ ½ mió kr. Um vit taka tað ógvusliga domið, at veitingarnar fella heilt burtur, so sigur multiplikatoranalysan í dømi 1, at føroysk framleiðsla hevði minkað 6%, tá búskapurin hevði lagað seg til, at ríkisveitingarnar vóru falnar burtur.

TALVA 10. HØVUÐSHUGTØK Í SAMBAND VIÐ RÍKISVEITINGAR OG SAMANHANGIR TEIRRA MILLUM

Stødd	Heiti	Týdningur	Talfestingar		
			Dømi 1	Dømi 2	Dømi 3
(1) IE	Innlendskur eftirspurningur = toka bruttotjóðarúrtoku	Nýtsla og ilogur	1,12*BTÚ	1,12*BTÚ	1,12*BTÚ
(2) NV	Veiting úr ríkiskassa	Minus veiting úr Danmark	12% av BTÚ	12% av BTÚ	12% av BTÚ
(3) BTÚ	Bruttotjóðartiltoka	Samlaða framleiðslan	BTÚ	BTÚ	BTÚ
(4) DkBTÚ	Veitingarpartur av BTÚ	Tann parturin av føroysku framleiðsluni, sum beinleiðis og óbeinleiðis stavar frá ríkisveitingunum.	6% av BTÚ	12% av BTÚ	18% av BTÚ
(5) FrBTÚ	Eginframleiðslan	Framleiðsla, um ongar veitingar hevdu verið.	94% av BTÚ	88% av BTÚ	82% av BTÚ
(6) k	Multiplikator viðv. NV	ΔBTÚ/ΔNV, tvs. broyting í framleiðslu við broyting í ríkisveitingum	0,5	1	1,5

Í dømi 2 og dømi 3 er ávirkanin av ríkisveitingum á føroyska búskapin mett at vera størri. Við at minka veitingarnar td. 100 mió kr hevði framleiðslan eftir dømi 2 minkað 100 mió. kr og eftir dømi 3 150 mió kr.

Gapið millum IE, BTÚ og eginframleiðslu

Nevnt varð í byrjanini, at tær grundleggjandi stoddirnar IE, BTÚ og tBTI fyri flestu búskapir vóru nokulunda líka stórar. Verður hugt at føroyska tjóðarroknskapinum fyri tíðarskeiðið, sæst, at stórur munur er á hesum stoddum, og hetta stendst av ríkisveitingunum. Um framleiðslan BTÚ = 100, er innlendski eftirspurningurin IE = 112 og eginframleiðslan FrBTÚ eftir taldømunum í talvuni omanfyri millum 82 og 94[4]. Um

[4] Hesi vísitol verða fyri grønlendska búskapin av Faldan mett til: BTÚ = 100, tBTI = 150 og GrBTÚ = 45, har GrBTÚ stendur fyri grønlendska eginframleiðslu.

føroyski innlendski eftirspurningurin, sum var í tíðarskeiðnum fra 1962-74 skuldi verið hildin á sama stigi uttan ríkisveitingar, hevði verið neyðugt við stórari uttanlandslántoku.

Tolini omanfyri viðv. multiplikatoreffekt (og tann út frá hesum metta eginframleiðsla) skulu takast við fyrivarni. Tolini eru ásett fyri at lýsa møguliga ávirkan, sum ríkisveitingarnar hevdu á føroyska búskapin í tíðarskeiðnum 1962 - 74, tá nøkulunda javnvág var á gjaldsjavnanum, tvs. at lítil og eingin nettouttanlandslántoka var.[5]

3.2 Ríkisveitingar/tilknýti til Danmark og føroyskt kreditvirði

Eftir 1974

Hugsast kann, at ávirkanin av ríkisveitingunum á aktivitetin í føroyska búskapinum í tíðarskeiðnum 1962-74 hevur ligið onkustaðni millum tey virði í dømi 1 og dømi 3, sum Talva 10 vísir. Hendan spurning fæst neyvan eintýtt svar upp á. Í tann mun henda ávirkan hevur gjort seg galdandi, so er hon í tíðarskeiðnum *eftir* 1974 bert partur av teirri ávirkan, sum ríkisveitingarnar kunnu hugsast at hava havt á føroyska búskapin.

Tann konjunkturávirkan, sum eftir 1974 fór at gera seg galdandi afturat multiplikatorávirkanini, var týdningurin, sum ríkisveitingarnar hevdu fyri kredittvirðið hjá føroyska búskapinum.

Sum umrøtt er í kapitli 5, vórðu kapitalmarknaðirnir internationaliserað eftir oljukreppuna í 1973. Flestu lond í vesturheiminum gjordu lógarbroytingar, soleiðis at tað varð lættari hjá myndugleikum og fyritokum at útvega figging í útlondum.

Figging sum fløskuhálsur í smb. við nýtslu- og fløgueftirspurning

Hugsast kann, at avmarkaðir figgingarmoguleikar uttanfyri Føroyar fyri 1974 vóru ein hovuðsgrund til, at realiseraði innlendski eftirspurningurin ikki varð størri enn tøka bruttotjóðarinntokan. Við øðrum orðum var ringt at figgja undirskot av týdningi á gjaldsjavnanum fyri 1974.

Men tann vaksandi internationali figgjarmarknaðurin gjordi, at føroyskir almennir myndugleikar og privati sektorurin í nógv størri mun enn áður fingu atgongd til lántoku uttanfyri Føroyar. Hesir lánimoguleikar vórðu frá 1974 til 1989 nógv brúktir, og hendan lántoka var ár um ár við til at figgja ein innlendskan eftirspurning, sum var nógv størri enn tað, føroyingar sjálvir figgjaðu við egnari framleiðslu og veitingum úr ríkiskassanum. Árligu undirskotini á gjaldsjavnanum hevdu við sær, at Føroyar frá at hava lítla nettouttanlandsskuld í 1974 skyldaðu 8,5 mia kr við árslok 1989.

---

[5] Multiplikatorávirkan í sambond við veitingar (og inntokur, sum ikki stava frá egnari "reinari" framleiðslu, td. í smb. við sølu av náttúruresourcum) kann hugsast at virka á ymsan hátt.

Multiplikatoreffektin er eitt marginalhugtak, sum sigur okkum hvussu nógv framleiðsla broytist við eini broyting í einum exogenum variabli. Hvørji búskaparlig viðurskifti verða roknað at verða exogen er upp til tann, sum ger sær model av búskapinum. Útflutningur (X) verður vanliga roknaður sum exogenur variabul, ma ti at stoddin á eftirspurninginum hjá útlendingum eftir føroyskari framleiðslu ikki verður fastlegd inni í føroyska búskaparliga rentslinum. Nokulunda sama tankagongd er nýtt í smb. við ríkisstuðulin.

Ein marginal broyting kann verða stór ella lítil. Í analysuni her kann verða talan um smáar broytingar viðv. ríkisveitingum ella stórar. Um ógvusligar broytingar verða framdar frá einum ári til annað, kann hugsast, at long tíð gongur, áðrenn búskapurin hevur funnið sær nýggja langtíðarjavnvág í sambond við framleiðslu og fólkatal.

Privat kreditvirði

Útlendskir kreditorar veittu lán til Foroya, ti teir mettu, at kreditvirðið var nóg gott. Tá talan er um kreditvirðið, hevur tað týdning at skilja millum alment og privat kreditvirði. Privatar fyritøkur kunnu fara á húsagang. Lógir fyriskipa, hvussu búgvið skal gerast upp og býtast millum eigarar og kreditorar, tá ein privatrættarlig fyritøka fer á húsagang. Hesi viðurskifti gera, at grundparturin í kredivirðinum hjá einari privatari fyritøku er rentabiliteturin í fyritøkuni og virðið á teimum aktivum, sum verða figgjað.

Trygdir

Bert í ávísan mun kann sigast, at lántokan hjá privata sektorinum var grundað á tað kreditvirði, sum hesin sektorur sjálvur hevði. Kreditvirðið hjá privata sektorinum kann greinast í tveir partar, kreditvirðið hjá 1) privata framleiðslu- og húsarhaldssektorinum og 2) peningastovnssektorinum.

Framleiðslu- og húsarhaldssektor

ad 1. Lánveiting úr útlondum til privata framleiðslu- og húsharhaldssektorin varð framd við, at útlendskir kreditorar sluppu fram at trygdum, sum framleiðslu- og húsarhaldssektorurin sjálvir stóðu fyri. Talan var um trygdir í fastari ogn, goymslum og annars í teimum anleggum og kapitalútgerðum, sum figging varð veitt í samband við. Útlendskir kreditorar hevdu tó avmarkaða atgongd til trygdir í fastari ogn. Til dømis sluppu donsk realkreditfelog ikki at veita figging til sethús. Hinvegin var ofta trupult hjá flestu búskapareindum í framleiðslu- og húsarhaldssektorinum beinleiðis at læna frá útlendskum kreditorum, ti talan var um smáar búskapareindir við stórari informatiónsfjarstoðu til útlendskan lánveitara. Privati framleiðslu- og húsarhaldssektorurin stóð tó fyri stórum parti av ti uttanlandslántoku, sum fór fram, men hetta varð í sera stóran mun hjálpt av ti kreditvirði, sum hesir lántakarar fingu frá foroyskum bankum og landskassanum í samband við veðhald.

Foroysku bankarnir

ad 2. Útlendsku lánveitararnir góðtóku fram til 1989 í stóran mun veðhald frá foroysku bankunum sum trygd. Fyrst á árinum 1989 vóru allar ábyrgdir hjá foroysku bankunum næstan 3 mia kr. Hetta svaraði tá til meira enn 250% av eginkapitalinum hjá bankunum, og roknast má við, at størsti parturin av hesum veðhaldum var veittur í samband við lántoku uttanfyri Foroyar hjá framleiðslu- og húsarhaldssektorinum.

At útlendskir lánveitarar mettu kreditvirðið hjá foroysku bankunum so hógt, at teir góðtóku so stór veðhald frá teimum, kann tykjast logið. Lagt skal tó verða til merkis, at avsetingar hjá foroyskum bankum í 80-unum hevdu verið óvanliga stórar sæð í mun til avsetingar hjá peningastovnum annars í ríkinum, og roknskapartolini vístu positiva gongd langt út í 80-ini. Hartil hevði ein stórur partur av útlánunum til fiskivinnuna landskassaveðhald, og hesi útlán minkaðu ti ikki í sjálvum sær um kreditvirðið hjá bankunum. Í ávísan mun kann tí sigast, at kredivirðið hjá bankunum kom frá landskassanum. Haraftrat vóru bankarnir serligar fyritøkur, av tí at tær róku virksemið eftir ríkislógum, undir eftirliti av Finanstilsynet.

Alment kreditvirði

Almennir stovnar og fyritøkur kunna ikki á sama hátt, sum privatar fyritøkur og húsarhald, fara á húsagang. Hetta hongur saman við, at tað almenna oftast við lóg hevur átikið sær at reka eitt ávist virksemi ella eina skyldu, og at tað almenna hevur rætt til at útvega inntøkur við skatti og gjoldum. Atgongdin hjá ti almenna til at útvega sær inntøkur við skatti ger, at serligt kreditvirði er tongt at hesum sektori.

Kreditvirði hjá landskassa og tilknýti til Danmark

Fyri føroyska almenna sektorin kemur harafturat kreditvirðið, sum stavar frá tí tilknýti til danska almenna sektorin (statskassan), sum er innbygt í heimastýrisskipanina, og sum hevur verið eyðsýnt í samband við rikisveitingarnar. Nógv bendir á, at útlendskir - og innlendskir - kreditorar í sambandi við lánveiting til føroyska almenna sektorin - og partvís eisini privata sektorin - hava havt hetta í huganum. Í øllum førum er í dag veruleiki, at danski staturin átók sær uppgávuna sum "lender of last resort", tá ið føroyski búskapurin var fyri álvarsligum bakkasti, og at staturin hervið stóð aftanfyri kreditvirðið hjá tí føroyska almenna sektorinum og eisini búskapinum sum heild.

Umsiting av almennum kreditvirði

Tað skuldi verið greið pengapolitisk uppgáva at fyrisitið almenna kredittvirðið við skynsemi. Út frá gongdini eftir 1974 og serliga í 80-unum má tó sigast, at kreditvirðið hjá tí almenna varð umsitið - møguliga ótilvitað - á sera óvarnan hátt. Hetta kom til sjóndar í sambandi við:

- landskassaveðhald, sum veitt vórðu í sambandi við lántoku hjá flutnings- og fiskivinnuni og almennum stovnum
- lántoku hjá almennum stovnum (uttan beinleiðis trygd frá landskassanum) og
- stórari lántoku hjá føroysku kommununum

Landskassin kom við hesum ikki bert at bera risiko í samband við sína egnu lántoku, men eisini í stóran mun í samband við lántoku hjá almenna sektorinum annars, peningastovnunum og framleiðsluvinnuni.

Hvat bygdi kreditvirðið á?

Sannlíkt er, at ein hovuðsgrund til, at kreditorar góðtóku, at landskassin varð bundin til so stóran tapsvanda, var, at inntøkukeldur landskassans ikki bert vóru tað, sum føroyska framleiðslan sjálv kundi bera, men eisini tær inntøkur, sum árliga vórðu veittar úr rikiskassanum og møguligar aðrar serligar stuðulsveitingar úr rikiskassanum, um tað tørnaði fyri. Afturat hesum hevur hákonjunktururin í tíðarskeiðnum 1983 til 89, tá ið tann stóra skuldarbindingin fór fram, helst gjørt, at lánveitarar yvirmettu virðið á teimum trygdum, sum veittar vórðu.

At almenna føroyska kreditvirðið samleiðis hekk saman við veitingum úr rikiskassanum og rikisrættarligu skipanini yvirhovur, og at tað varð umsitið so ekspansivt, gjørdi, at vanligar tapsvandametingar, sum hovdu við føroyska búskapin at gera, vóru linar. Figgjarligu marknaðirnir sendu ikki einstaka lántakaranum og lánveitaranum* rættu teknini um hækkandi rentustig og versnandi kreditmøguleikar sum ábending um vaksandi risiko í ti tíðarskeiði, tá ið tann stóra lántokan fór fram.

Í tíðarskeiðnum frá 1974 til 1989 vaks nettouttanlandsskuld Føroya, sum nevnt, upp í 8,5 mia kr. Nettouttanlandslántokan var serliga stór í árunum 1983 - 89. Tvs., at føroyski búskapurin í samskifti sínum við umheimin tók á seg útreiðslur, sum vóru uógv hægri enn tað, framleiðsla og rikisveitingar figgjaðu. Í tíðarskeiðinum vóru rikisveitingar í miðal 750 mió kr, meðan miðal nettolántoka í útlondum var 950 mió kr um árið.

---

* Hernámir eisini tey føroysku virkini og hústrathaldini, sum stórt sæð fyrdu allar sínar pengaplaseringar til føroysku peningastovnarnar.

Lántøka og íløgukvota

Íløgurnar í føroyska búskapinum hava, samanborið við onnur lond, verið óvanliga stórar. Í miðal var íløgukvotan, roknað sum lutfall millum íløgur og tøka bruttotjóðarinntøku, fyri tíðarskeiðið 1962-74 umleið 29% og í tíðarskeiðnum 1975-89 33%.

Undir vanligum umstøðum nýtist lántøka til at fíggja høgt íløgustig ikki at vera av ti ringa. Tvær fortreytir skulu tó vera til staðar.

- Fyri tað fyrsta er neyðugt, at útbyggingin av kapitalútgerðini ger búskapin betri fyri í framtíðini at framleiða stórri nøgdir og/ella at framleiða við betri kappingarføri. Íløgurnar, sum framdar vórðu í 80-unum, vóru í mongum førum beindar inn á vinnugreinar, sum fingu alt ov stóra orku. Hetta merkti fyri eitt nú fiskivinnuna, at framleiðslan vaks ikki, men minkaði.
- Fyri tað næsta er neyðugt í tann mun íløgur verða gjørdar í føroyska búskapinum til tess at skapa vokstur í framleiðsluni, at framleiðslutilfeingið er tøkt. Føroyski búskapurin var tíverri longu fyri miðjuna av 80-unum í ti stoðu, at arbeiðsmegi vantaði innan flestu vinnugreinar. Tann innflutti parturin av íløgunum má tí metast at hava verið sera stórur í seinna parti av 80-unum. Hetta kom ikki bert til sjóndar í undirskotinum á voru- og tænastujavnanum (tvs. XM liðið í likning 5), men eisini í lonum til útlendska arbeiðsmegi (tvs. part av NRL-liðinum í likning 5) og hækkandi innlendskum kostnaðarstigi.

5) $$GJ = XM + NRL - NV$$

Innlendski eftirspurningurin í tíðarskeiðnum 1974-89 var hvort ár stórri enn tøka bruttotjóðarinntokan. Við hesum var ein ónd ringrás byrjað, ti búskapurin fekk stórri og stórri uttanlandsskuld at dragast við og við hesum eisini stórri nettorentuútreiðslur til umheimin. Tvs., at NRL-liðið í likning 5) varð stórri. Vit kunna lýsa hesa gongd út frá likning 5) við tølum fyri 1971 og 1988 sum dømi.

TALVA 11: GJALDSJAVNI FØROYA FYRI 1971 OG 1989

Gjaldsjavnapartur		1971	1988
XM	Undirskot á voru- og tænastujavnanum	69	1.355
+NRL	Nettogjaldingar viðv. Rentum og lonum til útlond	11	1.100
- NV	Veitingar úr ríkiskassanum	93	855
= GJ	Gjaldsjavnahall	-13	1.600

Viðmerking: Í hesari uppstilling verður av frálæruligum grundum sæð burtur frá gjaldingum viðv. yvirskoti frá Danmarks Nationalbank, tryggingargjoldum og øðrum smærri gjaldingum. Samlaða undirskotið á loyvandi postum verður av hesum rundað upp til 1,6 mia kr, eins og avrundingar og metingar eru gjørdar í samband við tænastujavna og nettolonargjaldingar til útlond. Postarnir, sum eru nevndir aftast, eru ikki gjørdir upp í gjaldsjavnauppgerðum hjá Hagstovu Føroya, men eru partur av sonevndum "restbólki", sum fyri 1988 er mettur til umleið 1 mia kr. Hesin postur er í hevuðsheitum settur saman av óskráseltum tænastupostum og lønargjaldingum til og úr Føroyum. Undirskot á tænastujavna er her mett til 500 mió kr og í samband við XM lagt aftur at skrásettum tølum í kunngjørdum tølum frá Hagstovu Føroya. Restin av "restbólki", tvs. tað her mettu nettolonargjaldingar, er lagd aftur at mettum nettorentuútreiðslum, soleiðis sum hesar eru uppgjørdar av Hagstovu Føroya.

Talva 11 vísir, at í 1971 varð undirskot á voru- og tænastujavna (XM) saman við nettorentu og lønargjaldingum grovt sagt mótvigað av ríkisveitingum, soleiðis at samlaða úr-

slitið á gjaldsjavnanum var eitt minni yvirskot upp á 13 mió kr. Í 1988 er skuldin vorðin so stór, at nettorentuútreiðslur á NRL-posti (600 mió av 1,1 mia) vóru nærum líka stórar sum innlokuveitingar frá ríkiskassanum[7]. Tann í stóran mun lánfiggjaði aktiviteturin í føroyska búskapinum var so stórur, at innlendska arbeiðsmegin ikki rakk til. Hetta kemur í 88-tølunum til sjóndar á NRL-postum við, at lønir til útlendska arbeiðsmegi vóru um ½ mia kr. Undirskotið á NRL-posti í alt varð 1,1 mia kr. Afturat hesum hevði stóri innlendski eftirspurningurin við sær so stóran innflutning, at føroyski búskapurin, hóast eitt hampuligt ár til útflutning í samband við vøru- og tænastusamhandil sín við útlond, hevði eitt undirskot upp á uml. 1,3 mia kr. Leypandi postar í alt vistu við hesum uudirskot upp á 1,6 mia kr.

3.3. Veitingar úr ríkiskassanum og kappingarføri hjá føroysku viunni

Allýsingar

Kapping er týðandi hugtak í búskaparteori. Kappast verður á marknaðunum og her møta teir, sum framleiða vørur og tænastur, møguligum keyparum. Eru fleiri framleiðarar komnir út á marknaðin við somu (ella líknandi) framleiðslu, er sannlikt, at hesir fara at kappast um keyparar til framleiðslu sína. Kappingarparametrar eru prísur, dygd, gjaldstreytir, design, útveganartíð osfr.

Skiljast kann í millum innlendskar og útlendskar marknaðir. Á innlendska marknaðinum velur føroyski keyparin at ognа sær ávísa vøru ella tænastu, sum framleidd er í Føroyum ella úti í heimi. Á útlendska marknaðinum kunnu útlendskir brúkarar keypa sær føroyska ella útlendska framleiðslu.

Bæði á innlendskum og útlendskum marknaðum kappast føroyskar fyritokur móti útlendskum fyritokum, og í hesum sambandi verður ofta tosað um *kappingarføri* hjá føroysku vinnuni. Kappingarføri snýr seg um evni og møguleikar hjá føroyskum fyritokum at kappast við útlendskar fyritokur.

Um hví neyðugt er at geva kappingarførinum ans

Kappingarføri er eitt makroøkonomiskt hugtak, tvs. eitt hugtak, sum nýtt verður í samband við lýsing av og ætlanir fyri búskapin sum heild.

Vanligir málsetningar í búskaparpolitikki eru:

- arbeiði til øll arbeiðsfør
- javnvág á gjaldsjavna
- jøvn prisgongd
- framleiðsluvokstur.

Í sambandi við kappingarføri verður serliga tosað um arbeiði til øll arbeiðsfør (eisini nevnt *innara javnvág*) og javnvág á gjaldsjavna (eisini nevnt *ytra javnvág*).

Fyri smáar opnar búskapir kann tað vera trupult at rokka málunum um innara og ytru javnvág samstundis. Tá ið roynt hevur verið at økja innlendska eftirspurningin til tess at basa arbeiðsloysi, hevur hetta ofta havt við sær gjaldsjavnaundirskot orsakað av vaksandi innflutningi og minkandi útflutningi. Tá ið innlendski eftirspurningurin til nýtslu og ilegur hinvegin er minkaður, er arbeiðsloysið vaksið og gjaldsjavnin batnaður.

---

[7] Árið eftir, tvs. í 1989, varð nettorentuposturin stórri enn veitingarnar

Málkonflikt

Hesir búskaparteoretisku samanhangir eru eisini galdandi fyri føroyska búskapin, og gongdin seinnu helvt av 80-unum við ov lítlari (innlendis) arbeiðsmegi og stórum gjaldsjavnaundirskoti og gongdin fyrru helvt av 90-unum við stórum gjaldsjavnayvirskoti og arbeiðsloysi eru dømi um hetta.

Andsøgnin millum búskaparmálini javnvág á gjaldsjavna og lítið/einki arbeiðsloysi hevur givið teimum, ið leggja til rættis búskaparpolitikkin, trupulleikar. Tey vanligu búskaparamboðini til at ávirka eftirspurningin við - tvs. figgjarpolitikkurin* og vanligi pengapolitikkurin* - hava ikki verið nøktandi, um málini um innaru og ytru javnvág skulu røkkast samstundis. Neyðugt kann tí vera at gera onnur búskaparpolitisk inntriv, sum mótvirka óynsktum fylgjum fyri gjaldsjavnan av øktum innlendskum eftirspurningi. Hetta kann gerast við politikki, sum hevur til endamáls at bøta um kappingarevnini hjá føroyskum vinnulívi.

Verður bott um kappingarevnini, verða innara og ytra javnvágin ávirkaðar, soleiðis at eftirspurningur í Føroyum og í útlondum verður vendur frá útlendskari framleiðslu til føroyska framleiðslu. Hetta slag av búskaparpolitikki hevur tí ikki í sær somu hjáárin sum figgjar- og pengapolitikkurin.

Tað, sum tað kostar at framleiða, hevur týdning fyri kappingarførið hjá føroyska vinnulívinum. Her er serliga talan um lønarlag, produktivitet, rentustig og gjaldoyrakurs.

Lønarlag

Samanhangir, sum hava at gera við lutfalsliga stórar einvegis gjaldingar til ein búskap og tey árin hetta fær á innlendis lønarstigið og harvið kappingarførið, eru nágreiniliga lýstir í bókini "Grønlands økonomiske udvikling" hjá Martin Paldam. Spurningurin um lønarstigið verður tí ikki greinaður út í æsir í hesum áliti, men bert hovuðssamanhangir verða endurgivnir.

Vit taka aftur útgangsstøðu í einum normalum búskapi. Tað vil siga, at vit hugsa okkum ein búskap, sum ikki fær einvegis veitingar frá útheiminum, og sum í útgangsstøðuni ikki hevur uttanlandsskuld og trupulleikar av inflatión (prísvokstri).

Produktivitetur

Sum vera mann, ynskja flest oll í hesum landi hægri løn, men útboð og eftirspurningur eftir arbeiðsorku, tvs. arbeiðsmarknaðurin, skapar okkum eina avmarkaða løn. Lønarlagið verður avmarkað av, hvat búskapurin kann bera, og her verður serliga hugsað um, hvat virði hvør lønartími kann skapa. Vi øðrum orðum er produktivitetur av stórum týdningi fyri lønarlagið í einum búskapi.

---

* Sum kann allýsast sum reynd myndugleikanna gjøgnum inntøkur og útreiðslur hins almenna at ávirka samlaða eftirspurningin og harvið virksemið í búskapinum.

* Sum kann allýsast sum reynd myndugleikanna at ávirka rentustigið og lánsmøguleikarnar. Pengapolitikkurin ávirkar soleiðis ikki beinleiðis eftirspurningin í búskapinum, men óbeinleiðis. Við at gera tað lætt (og bligt) at læna er sannlíkt, at eftirspurningur eftir íløgu- og nýtsluvørum veksur, meðan hækkandi renta og versnandi lánsmøguleikar minka um samlaða keypið til íløgu og nýtslu. Grundin til, at orðingin "vanligur pengapolitikkur" er nýtt her, er, at myndugleikar hava ikki nýtt umsiting av almennum kreditvirði tilvitaðvbeinleiðis sum amboð. Sæð út frá føroyskum reytidum í 80-unum er greitt, at her er talan um ógvusligt pengapolitiskt amboð, sum nýtast skal við størstu varsemi.

Hækkandi lønir viðføra hækkandi prísir og vaksandi innflutning

Lønir, sum hækka, hava við sær størri keypsorku hjá fólki, og tað elvir aftur til vaksandi innflutning og prishækking. Hesir samanhangir kunnu lýsast við hesum dømi. Vit hugsa okkum, at hvør føroyingur fær 20% í lønarhækkan, og at hann velur at brúka 60 oyru av hvørjari krónu, hann hevur fingið í lønarhækkan, meðan 40 oyru fara til uppsparing. Hevur búskapurin eina innflutningskvotu upp á 40% av privatu nýtsluni hevur lønarhækkingin við sær, at gjaldsjavnin versnar 5% av samanlogdu lønarhækkingini (20% * 60% * 40%). Restin av nýtsluvøkstrinum hevði farið móti innlendskari framleiðslu. Hetta hevði fyri ein part givið størri innlendska framleiðslu, men hugsandi er, at prislegan eisini hækkaði. Var lítil ella ongin tøk arbeiðsmegi fyri lønarhækkingina, er sannlíkt, at framleiðsluvoksturin hevði verið sera lítil, meðan prishækkingin hevði verið stór.

Ein slík gongd átti at fingið politiska myndugleikan at tikið stig til tess at røkka búskaparligu málunum fyri gjaldsjavna og inflatión. Hetta kundi til dømis verið gjørt við at minka innlendska eftirspurningin við almennum sparingum og/ella skattahækkingum. Um nú upphædd, sum svarar til lønarvoksturin, kemur til búskapin, sum gáva úr útlondum, kunnu vit tó hugsa okkum, at tað politiskt hevði verið trupult (og kanska óneyðugt) at gjørt tiltøk, sum avmarkaðu keypsorkuna.

Vinnur í altjóða kapping og vinnur í innlendskari kapping

Ymist hevði verið, hvussu hækkaða keypsorkan - likamikið, um hon stavaði frá lønarhækkan ella einvegis veiting úr umheimi - hevði ávirkað ymsu vinnugreinarnar. Fyri útflutningsvinnuna, fiskivinnuna, hevði lønarhækkingin gjørt, at skiftisavlopið minkaði og fyri ávísar fiskavørur gjørdist negativt. Fyri vinnur, sum kappast við innfluttar vørur og tænastur, hevði lønarhækkingin eisini havt við sær størri framleiðslukostnað og harvið minni vinning. Fyri ein part, kundu hesar vinnur loyst trupulleikan við at hækka prísir, men viljin hjá føroyingum (og øðrum kundum) til at "keypa føroyskt", hevði uttan iva minkað, um føroyska framleiðslan varð munandi dýrari enn útlendska framleiðslan.

Samanumtikið hevði hækkað lønarlag havt við sær, at kappingarførið versnaði og at nokur virki innan vinnur við framleiðslu, sum lættliga fæst inn á internationalan marknað, hovdu farið á húsagang.

Ríkisveitingar og fylgjur

Hyggja vit at ríkisveitingunum út frá hesum sjónarhorni, kunna vit gera hesar niðurstøður. Veitingarnar hava elvt til:

- Møguleika fyri einum innlendskum lønarstigi, sum er hægri enn produktiviteturin loyvir.
- Ov hugt lønarstig í mun til produktivitet ber í sær vánaligt kappingarfori, men fáa føroyingar stórar einvegis veitingar, er ikki so álitið fyri javnvágina á gjaldsjavnanum at hava gott kappingarfori.
- Hetta kann føra til, at framleiðslan verður bend móti vinnum, sum gera vørur og tænastur - m.a. almennar tænastur - ið ikki verða handlaðar millum lond. Trupult verður eisini at fara undir nýggja framleiðslu í teimum vinnum, sum kappast við útlendska framleiðslu

Produktivitetur og ríkisveitingar

Sum sæst omanfyri eru fleiri viðurskifti kring ríkisveitingar og lønarlag, sum kunna hava havt óhepna ávirkan á kappingarførið hjá føroyska búskapinum. Meu ríkisveitingarnar kunna eisini hugsast at hava havt góða ávirkan á kappingarførið í samband við teir karmar, sum føroyska vinnan hevur fingið at virka undir. Við hjálp frá ríkiskassanum

hevur almenni sektorurin kunnað gjort stórar útbyggingar í samferðslu loftvegis, á sjógvi og landi. Ein góður infrastrukturur botnar um kappingarførið hjá einum búskapi av tí, at virki spara tíð og pening til flutning av rávøru, arbeiðsmegi og endaligari framleiðslu.

Somuleiðis hevur útbygging og rakstur av útbúgvingarverki í Føroyum (og møguleikar fyri at nýta útbúgvingarverkið í Danmark og aðrastaðir) verið við til at tryggja føroyskum virkjum arbeiðsmegi, sum er før fyri at menna og nýta nýmótans tøkni í framleiðsluni.

3.4. Samandráttur

Virðið á ríkisveitingunum hevur í miðal fyri árini 1962-74 svarað til 12% av bruttotjóðarúrtoku hjá Føroyum. Fyri tíðarskeiðini 1975-89 og 1990-94 hevur lutfallið verið ávikavist 15% og 18% av BTÚ. Veitingar úr ríkiskassanum eru í miðal fyri tíðarskeiðið 1962-74 vaksnar 9%, tá hædd er tikin fyri inflatión. Tilsvarandi realvokstur fyri 1975-89 var 5% og fyri 1990-94 3%.

Einvegis veitingar til Føroya úr ríkiskassanum hava uttan iva havt týdningur fyri framleiðslustigið í føroyska búskapinum, men torført er at siga nágreiniliga, hvussu stór ávirkanin hevur verið. Í hesum kapitli verður vist á 3 slóg av árinum, sum stava frá ríkisveitingunum. Tey eru:

- multiplikatorávirkan
- kreditvirðisávirkan
- ávirkan á kappingarførið

Multiplikator-ávirkan

Við multiplikatorávirkan verður her hugsað um, hvussu nógv prosent føroysk framleiðsla broytist fyri hvørt prosent, ríkisveitingar broytast. Hetta álit setir ikki neyv tøl á multiplikatorin. Í staðin er ein karmur - ella økonomiskt modell - sett fram við taldømum. Domini lýsa multiplikatorar við útmarkvirðunum ½ og 1½. Broyting í BTÚ við burturfalli av ríkisveitingum svarandi til 12% av verandi BTÚ við einum multiplikatori sum er ½ kann eftir valdum modelli metast til 6%. Um multiplikatorurin er 1½ verður BTÚ eftir neyðuga tillagingartíð 18% lægri enn BTÚ við ríkisveitingum.

Sum sagt ber illa til at meta um multiplikatoreffekt viðv. ríkisveitingum, m.a. tí, at ríkisveitingarnar ikki í sjálvum sær eru eftirspurningskomponentur. Veitingarnar koma fyri tað nesta upp í føroyska búskapin sum inntøka hjá landskassanum, og skulu tí broytast til eftirspurning eftir arbeiðsmegi og tilfari, áðrenn tær kunnu hava nakra ávirkan á BTÚ. Hetta verður gjørt við politiskum samtyktum um útreiðslur og inntøkur landskassans, og tað ber ikki til at marka júst nýtsluna av "blokkinum" í hesum hópi. Vísast kann tó á, at bondini á skatta- og útreiðslupolitikkin hava lyndi til at linka, tá figging av almennu sektorinum ikki verður fingin til vega frá landsins borgarum, men uttaneftir.

Ávirkan frá almennum kreditvirði

Trupult er eisini at siga nágreiniliga hvør multiplikatoreffektin er av ríkisveitingunum, tí ***kreditvirðisirinið*** í samband við ríkisveitingarnar - og heimastýrisskipanin sum so - eisini hevur havt stóra ávirkan á búskaparliga virksemið í nýggjari tíð. Í 80-unum, tá hendan ávirkan serliga gjørdi seg galdandi, komu alhóa væl stórar penganøgdir til

føroyingar í samband við heimtoku av lánum enn penganogdir, ið vórðu veittar føroyingum við ríkisveitingum.

Visast kann á, at kreditvirðið hjá føroyska búskapinum hevur verið stórt, og at føroyingar hava nýtt hetta kredittvirði ógvuliga ekspansivt. Hetta er sannroynd, sum gongdin í nettouttanlandsskuld Føroya í 80-unum er prógv um. Stórur partur av hesum kredittvirði, sum nýtt er bæði í samband við privata og almenna lántoku stavar frá kreditvirðinum hjá føroyska almenna sektorinum og hetta kreditvirðið er tengt at kreditvirðinum hjá statskassanum (danska almenna sektorinum). Lántokan í 80-unum hevur havt ávirkan á BTÚ, mátað í krónum. Men BTÚ-veksturin hevur neyvan verið so stórur, tá ið hædd er tikin fyri tí pris- og lønarvekstri, sum tann stóri innlendski eftirspurningurin hevði við sær.

Kappingarevni

Í hesum sambandi hevur tað týdning at lýsa kappingarførið hjá føroyska búskapinum. At Føroyar hava fingið stórar einvegis veitingar úr Danmark, hevur havt við sær, at ikki var so neyðugt við góðum kappingarfori fyri at hava javnvág á gjaldsjavnanum, tí at ríkisveitingarnar figgjaðu undirskotið á vøru- og tænastujavnanum.

Lønarlagið kundi tí vera hægri og/ella produktivitetur lægri, enn tey kundu verið uttan stóru ríkisveitingarnar. Hetta hevur havt týdning fyri vinnubygnaðin á tann hátt, at vinnur í kapping við útlendskar framleiðarar hava havt ilt við at fóta sær, meðan vinnur (og almennir stovnar) uttan kapping uttanífrá hava staðið sterkar í kappingini um tøku innlendsku arbeiðsmegina.

Hendan avskeplan av vinnubygnaðinum varð ikki minni av tí ov stóra innlendska eftirspurninginum í 80-unum. Trupult var at stovna nýggjar útflutningsvinnur og at byrja framleiðslu av vørum og tænastum, sum føroyingar vanliga hovdu flutt inn.

Ríkisveitingarnar hava tó havt góða ávirkan á kappingarførið, tí tað hevur borið til at útbyggja infrastruktur og útbúgvingarverk.

Samanumtikið kann sigast, at positiv árin av ríkisveitingum hava verið at:

- føroyingar hava havt ráð til væl storri nýtslu og ílogur, enn teir sjálvir framleiddu (uttan lántoku uttanlands),
- innlendska framleiðslan hevur verið storri, enn hon hevði verið uttan ríkisveitingar,
- ríkisveitingarnar (tilknýtið til Danmark) hava styrkt føroyskt kreditvirði, sum hevði við sær lægri rentu,
- ríkisveitingarnar hava gjort tað møguligt at útbyggja infrastruktur og útbúgvingarverk skjótt og soleiðis bott um kappingarevnini hjá føroysku vinnuni

Negativ árin av ríkisveitingunum hava verið:

- linari krav til búskaparligt umhugsni. Tilknýtið til danska ríkið gav eitt kredittvirði, sum gjordi at ongar figgjaravmarkingar (budgetrestriktiónir) vóru, og tí bar til hjá føroyingum at læna seg um rygg,
- vandi fyri ov høgum lønarlagi og kostnaðarstigi, sum fremur ein vinnubygnað, ið ger búskapin bundnan at framhaldandi ríkisveitingum.

4. KAPITALISERING AV BLOKKINUM

Um hugtakið kapitalisering

4.1 Roknitoknisk lýsing av kapitaliseraðum virði

Tá tosað hevur verið um kapitalisering, er tíðum komið fyri, at luttakarar í einum orðaskifti hava nýtt hugtakið "kapitalisering" um eitthvørt annað enn tað, tað er. Til tess at sleppa undan at hugtokini flokjast verður fyrst í hesum kapitli greitt frá, hvat liggur í hugtakinum og hvussu kapitaliseraö virði verður roknað út.

Kapitaliseraö virði er ein roð av gjaldingum, t.d. árligar gjaldingar, roknaðar um til eina samlaða upphædd eitt ávist tíðarhvarv við rentu og rentu rentu. Gjaldingar kunnu førast aftur í tíð undan gjaldingunum, tá verður talað um nútíðarvirði ella aftурdiskonteraö virði. Sonu gjaldingar kunnu eisini førast fram í tíð til aftaná gjaldingarnar, tá verður talað um framtíðarvirði ella forútdiskonteraö virði.

Skal veljast ímillum at fáa 100 kr útgoldnar í dag ella um eitt ár, verður uttan iva valt at fáa peningin útgoldnan í dag. Við t.d. 5% í rentu kundi peningurin verið settur til rentu í 1 ár, og harvið havt eitt virði uppá 100 kr + rentu í eitt ár ella

$$100*(1+0,05) = 105 \text{ kr}$$

eftir hetta árið við hesum 5% í rentu. Í hesum fori er framtíðarvirðið 105 kr. Er rentan 0%, kann tað gera tað sama, um tær 100 kr verða útgoldnar í dag ella um eitt ár, tí eingin renta legst afturat.

So kann verða spurt, hvat virði gjaldingin skal hava í dag, fyri at hon skal verða verd 100 kr um eitt ár. Tað veldst um rentuna, og siga vit, at rentan er 5%, verður nútíðarvirðið:

$$\frac{100}{(1+0,05)} = 95,24$$

Skulu vit við oðrum orðum kapitalisera ta gjalding, sum átti at falla um 1 ár, fáa vit í dag útgoldnar kr 95,24, sum er sama virði sum 100 kr um 1 ár.

Dagliga verða lánsbrov prissett á tann hátt, at keypari keypir lánsbræv fyri eina upphædd, sum hann í mesta lagi vil lata í útgjaldi í dag fyri í framtíðini at fáa eina upphædd í inngjaldi. Munurin millum hesar upphæddir er rentan.

Á marknaðinum eru tveir partar. Hin parturin, lánsbrævaseljarin, selir lánsbræv fyri eina upphædd, sum hann í minsta lagi vil hava í inngjaldi í dag, fyri um 1 ár at gjalda 100 kr aftur.

Á henda hátt kunnu vit hugsa okkum, at investor keypir 1 ára lánsbræv, navnvirði 100 kr og onga áljóðandi rentu fyri 5% í (effektivari) rentu. Kursurin verður tá 95,24.

Niðurstoðan í hesum dømi er, at móttakarin er eins ríkur ella fátækur, um hann fær 95,24 kr í dag ella 100 kr um 1 ár.

Í dømunum omanfyri var ikki roknað við inflatión, sum minkar um virðið á peninginum. Siga vit, at rentan framvegis er 5% og inflatiónin er 5%, er

$$\text{realrentan} = \frac{(1+\text{renta})}{(1+\text{inflatión})} - 1 \qquad \frac{(1+0{,}05)}{(1+0{,}05)} - 1 = 0 \qquad \approx \text{ renta - inflatión}$$

Undir hesum fortreytum verður nútíðarvirðið á teimum 100 kr um eitt ár

$$\frac{100}{\left[\frac{(1+0{,}05)}{(1+0{,}05)}\right]} = 100,$$

tí inflatiónin máar burtur virðið. Við realrentu uppá 0% hava 100 kr í dag virðið uppá 100 kr um eitt ár og ovugt.

Longur úti í framtíðini vit fáa upphæddina, minni týdning hevur hon í nútíðarvirði, sum vist niðanfyri við eini árligari gjalding á 100 kr yvir 3 ár, 5% í rentu og inflatión uppá 2%:

$$\frac{100}{\left[\frac{(1+0{,}05)}{(1+0{,}02)}\right]} = 97{,}14$$

$$\frac{100}{\left[\frac{(1+0{,}05)}{(1+0{,}02)}\right]^2} = 94{,}37$$

$$\frac{100}{\left[\frac{(1+0{,}05)}{(1+0{,}02)}\right]^3} = 91{,}67$$

$$\underline{283{,}18}$$

Kapitaliserøða virðið á ollum trimum gjaldingunum er sostatt ialt 283,18.

Fyritreytir fyri kapitalisering av blokkinum

At náa fram til rætt kapitalvirði krevur, at ávisar fyritreytir eru loknar, og uevnast skal,

- at vissa er um framtíðar inngjaldingarnar,
- at roknað verður við nevvari framtíðar inflatión ella vokstri í gjaldingini
- at diskonteringsrentan er tann rætta.

Rætta kapitalvirðið er, sum vist á omanfyri, gjaldingar í framtíðini, sum eru roknaðar um til dagsins virði, og tá viðurskiftini eru millum tveir partar, er í grundregluni ikki munur á nær, gjaldingarnar falla, men vissa skal verða fyri teimum. Tað ber jú ikki til at kapitalisera gjaldingar, sum ongantið hevdu komið.

Sum er, hevur landskassin lyfti um heildarstuðul í 1996, 1997 og 1998 á sama stigi, t.v.s. javnað við donsku inflatiónini. Tað er illa hugsandi, at blokkstuðulin verður heilt tikin av eftir 1998, men upphæddin verður ásett eftir samráðingar millum partarnar báðar, tann latandi og móttakandi, og veldst um hvørjar vánir eru fyri føroyska samfelagsbúskapin.

Kapitalvirði verður her útroknað eftir heildarveitingunum ella blokkinum til landskassan. Aðra staðir í álitinum verður roknað við samlaðu ríkisútreiðslunum av Føroyum. Útrokningarnar kundu eins væl verði gjordar av útreiðslunum, sum ríkið hevur av Føroyum. Í tí fori hevði kapitalvirðið verið tilsvarandi storri.

Skal kapitalvirðið á blokkinum roknast, má gitast um gjaldingarnar, t.v.s. hvussu stórar tær verða, og hvussu nógv ár tær fara at ganga. Framferðarhátturin er tann sami, tá kursvirðið á lánsbrovum verður roknað, men tá er bindandi lyfti um gjaldingarnar, sum ikki skal gitast ella metast um.

Kapitalisering undir ymsum fortreytum

Fyritreytin um framtíðar inflatión ella vokstur í gjaldingini ávirkar stoddina á kapitalvirðinum. Við at hyggja at talbrotunum omanfyri sæst, at jú storri inflatión roknað verður við í mun til rentuna, jú minni verður nevnarin og jú storri kapitalvirðið. At rokna við inflatión er tað sama sum at rokna við vokstri í árligu gjaldingunum. Av hesum sæst, at samanhangur er millum inflatión og stoddina á framtíðar inngjaldingunum.

Spurningurin um, hvør diskonteringsrenta er tann rætta, kann vera ringur at avgera, og tí kann verða neyðugt at grundgeva seg fram til ta frægastu.

Skal blokkurin kapitaliserast, merkir tað, at danski staturin má fáa alla upphæddina til vega í dag í staðin fyri so hvørt, sum higartil. Staturin útvegar peningin við at útskriva og selja lánsbrov, og lánstíðin svarar til ta tíð, sum føroyingar annars hevdu fingið árliga veiting. Hinvegin kann føroyska heimastýrið tá seta ta kapitaliseraðu upphæddina í donsk lánsbrov. Tí er ikki av leið at nýta donsku statslánsbrævarentuna í hesum viðfangi.

Endaleys gjaldsrekkja

Verður blokkurin útgoldin í alla framtíð á verandi stigi, verða fyritreytirnar hesar:

Gjalding	860 mió kr
Vokstur/inflatión	2,00%
Renta	8,21%

Gjalding er tann upphædd, sum verður latin Føroyum í 1996. Inflatiónin er framvegis sett at verða á sama stigi sum í dag. Rentan á 28 ára statslánum er 8,21% og tí nýtt her[10]. Undir hesum fyritreytum verður kapitaliseraða virðið

[10] Í donunum er rentan tann 5. september 1996 nýtt.

$$\frac{860}{\left[\frac{1,0821}{1,02}\right]-1} = 14.126 \text{ mió}$$

Kapitalisering yvir 28 ár

Annar møguleiki er, at stjórnin og landsstýrið semjast um, at føroyingar í dag fáa útgoldið kapitaliserað virðið av blokkstuðlinum tey næstu 28 árini. Fyritreytirnar verða tá:

Gjalding	860 mió kr
Vekstur/inflatión	2,00%
Renta	8,21%
Áramál	28 ár

og kapitaliserað virðið verður

$$\frac{860}{\sum_{t=1}^{28}\left[\frac{(1+0,0821)}{(1+0,02)}\right]^t} = 11.426 \text{ mió kr}$$

Kapitalisering yvir 8 ár og 5 ár

Hugt kann eisini verða eftir, hvussu stórt kapitaliserað virðið á blokkinum verður, um hann hevði verðið latin ávikavist 8 og 5 ár fram í tíðina:

Áramál	8 ár	5 ár
Gjalding	860 mió kr	860 mió kr
Vokstur/inflatión	2,00%	2,00%
Renta	7,06%	6,29%
Kapitaliserað virði	5.567 mió kr	3.807 mió kr

Um olja verður funnin á føroyskum øki

Higartil hevur ikki verið hugt at blokkinum við atliti til væntaða oljuvinnu í Føroyum. Væl er hugsandi, at danir í eini samráðingarstoðu fara at hava í huga vánirnar um inntøkur úr undirgrundini.

Undir slíkum umstøðum er ikki realistiskt at hugsa sær, at blokkstuðul verður goldin Føroyum á sama stigi næstu 30 árini. Niðanfyri er gjord ein roynd at meta um gongdina í blokkinum undir hesi fyritreyt, eins og kapitaliserað virðið er roknað út.

Í dominum er roknað við, at blokkurin verður veittur á núverandi stigi fyrstu árini. Síðani minkar hann javnt til tess hann fellur burtur. Verður hetta so, er kapitaliserað virðið á blokkinum 5,7 mia kr.

TALVA 12. NÚTÍDARVIRÐI Á BLOKKSTUÐLINUM

t	Ár	Renta r	Inflatións-rata g	Diskonter-ingsfaktor d	Blokk-stuðul C	Nútiðar-virði d*C
1	1997	7,5%	2,0%	94,9%	860	816
2	1998	7,5%	2,0%	90,1%	860	775
3	1999	7,5%	2,0%	85,5%	860	735
4	2000	7,5%	2,0%	81,1%	860	698
5	2001	7,5%	2,0%	77,0%	860	662
6	2002	7,5%	2,0%	73,1%	860	628
7	2003	7,5%	2,0%	69,3%	717	497
8	2004	7,5%	2,0%	65,8%	573	377
9	2005	7,5%	2,0%	62,4%	430	268
10	2006	7,5%	2,0%	59,3%	287	170
11	2007	7,5%	2,0%	56,2%	143	81
Nútíðarvirði						**5.707**

Viðm: Diskonteringsfaktor $d = 1/((1+r)/(1+g))^t$

4.2 Viðurskifti viðvíkjandi blokkinum frá ymsum áskoðanum

Sum greitt er frá í byrjanini av hesum kapitli, er sjálvur grundtankin í einari kapitalisering, at ein roknar seg fram til, hvussu stór ein upphædd, ið verður útgoldin í einum beinanvegin, skal vera, fyri at hon skal hava sama virði fyri móttakarin sum ein rað av gjaldingum yvir fleiri ár. Tvs, at móttakarin hvorki verður fátækari ella rikari av at fáa ta kapitaliseraðu upphæddina útgoldna heldur enn sum eina rað av gjaldingum. Í prinsippinum skuldu Foroyar sostatt hvorki blivið rikari ella fátækari av, at blokkurin var kapitaliseraður.

Fyritreytirnar fyri hesa niðurstoðu eru tó, sum omanfyri vist á:

- at vissa er um framtíðar inngjaldingar
- at vissa er fyri hvussu stór framtíðar inflatión er
- at diskonteringsrentan er tann rætta

Ásannast má, at vissa ikki kann fáast fyri hesi viðurskifti, tá ið talan er um blokkstuðulin. Varð blokkurin soleiðis kapitaliseraður oftir t.d. 10 árum, meðan blokkveiting annars helt fram næstu 30 árini, hevdu Foroyar verið fátækari. Øvugt hevdu Foroyar verðið rikari, um blokkveitingin annars bara helt fram næstu 5 árini. Men viðurskifti og umstoður broytast stoðugt, so tað fæst sjálvandi ikki at vita, og als ikki so leingi Danmark ikki hevur tikið avgjørda endaliga stoðu til spurningin.

Sum hovðusregla mugu vit rokna við, at danir og foroyingar vita eins nógv ella lítið um hesi viðurskifti. Verður kapitaliseringin ein vinningur fyri Foroyar, gerst hon harvið oin missur fyri Danmark, og øvugt.

Ein kundi kanska hugsað sær, at ein hevði ein "regulerings-klausul" í møguligari avtalu um kapitalisering, soleiðis at ein kundi rættað ta kapitaliseraðu upphæddina, um tann faktiska gongdin ikki samsvaraði við fortreytirnar fyri útrokningina av blokkinum. Á

hendan hátt hevði verið møguligt at komið rættiliga nær at tí "rætta" kapitaliserða virðinum.

Munurin millum ein kapitaliseraðan blokk og ein blokk í fleiri gjøldum er í prinsippinum, um ongar bindingar eru, at kapitaliseraði blokkurin kann nýtast, sum føroyingar vilja. Upphæddin kann bindast í lánsbrev og rentuavkastið nýtast til t.d. rakstur av almenna sektorinum. Lánsbrevini kunnu eisini verða seld so við og við og harvið kann gjaldføri førast til landskassan í sama mynstri, sum um blokkurin annars hevði verið goldin út Danmark. Kapitaliserða virðið á blokkinum kundi eisini, alt sum tað var, verið nýtt innan stutta tíð til td. ilogur o.s fr

Um blokkurin longu er kapitaliseraður

Føroyingar kunnu tó ikki nýta tann kapitaliserða blokkin sum teir vilja. Føroyar fingu milliardaupphædd, tá lán vórðu tikin til ymisk endamál. Hesi lán lótu lánveitarar, sum óiva hildu, at danir føru at halda fram at flyta føroyingum pengar árliga. Hetta hava lántakararnir helst eisini hildið. Á tann hátt er frammanundan roknað við blokkinum, so sigast kann, at hann longu er kapitaliseraður (forútdiskonteraður).

Skuldin er fyri stóran part upptikin av privatum lántakarum, men við trygdum frá landskassa og peningastovnum. Síðan hevur landskassin við effektivum veðhaldum og bankabjargingum yvirtikið stóran part av uttanlandsskuldini, meðan danska ríkið er komið inn sum høvuðslánveitari landskassans.

Verður kapitaliserða virðið á blokkinum útgoldið føroyingum í dag og nýtt til at aftur gjalda skuld við, verður hetta mest ein minking av bruttotolum. Skuldin og harvið lánsgjald minka, eins og árliga blokkveitingin minkar ella fellur burtur.

Tískil eru føroyingar bundnir til at nýta tann kapitaliserða blokkin á ávísan hátt, og hetta hevur við sær fylgjur fyri likviditetin hjá landskassanum. Rentugjaldingar og avdráttir fyri skuldina til danska statin falla burtur. Um grundarlagið fyri útrokningum av kapitaliserða blokkinum er ein blokkur, ið minkar um nokur ár, so er tað gjaldføri, føroyski búskapurin missur í árligum blokki tey fyrstu árini stórri enn tað hann sparir í rentum. Tvs., at føroyski búskapurin fær eitt verri úrslit á gjaldsjavnarnum samstundis, sum rakstur landskassans versnar (Talva 13 og Talva 14). Um tann kapitaliseraði blokkurin verður roknaður út frá blokkgjaldingum í alla framtíð,. so versnar gjaldsjavnin og rakstur landskassans ikki.

Meting um gjaldsjavnan uttan blokkstuðul

Tá skuld Føroya til statskassan í 1998 verður upp á tað mesta, verða rentugjaldingarnar til statskassan væntandi 380 mió kr. Við sama árliga vokstri sum undanfarin ár - 2% - kann blokkstuðulin fyri 1998 roknast til 894 mió kr. Verður blokkurin kapitaliseraður og mótroknaður í skuldini til ríkiskassan, verða rentumar minni at gjalda, meðan inntokan frá blokkstuðulinum fellur burtur.

Talva 13 vísir eina meting av úrslitinum á loypandi postum, eftir kapitalisering av blokkinum, har kapitalvirðið verður á leið tað sama, sum skuldin til statskassan, samanber dømið frammanfyri, har blokkveiting í 8 ár verður kapitaliserað til umleið 5,6 mia kr. Í tí førinum versnar avlopið við góðum 500 mió kr.

Verður blokkurin í staðin kapitaliseraður, roknað yvir 28 ár, kann avkastið av muninum millum kapitalvirðið og skuldina til statskassan plaserast langt, og kasta so mikið av sær, at gjaldsjavnaúrslitið ikki broytist stórvegis.

TALVA 13. METING UM GJALDSJAVNAN 1998

Mió kr	Við blokk-stuðuli	Uttan blokk-stuðul	Munur
Útflutningur (fob)	2.224	2.224	
Útflutningur, tænastur	325	325	
Inntekuflytingar, inntekur	1.757	863	-894
Inntekur frá útlondum	**4.306**	**3.412**	**-894**
Innflutningur (cif)	1.936	1.936	
Innflutningur, tænastur	651	651	
Inntekuflytingar, útreiðslur	725	345	-380
Útreiðslur til útlond	**3.312**	**2.932**	**-380**
Handilsjavni	288	288	
Tænastujavni	-326	-326	
Veitingarjavni	1.032	518	-514
Loypandi postar	**994**	**480**	**-514**

Meting um figgjarlógina uttan blokkstuðul

Á sama hátt sum við gjaldsjavnanum, er gjord ein roynd at meta um landskassans inntekur og útreiðslur. Talva 14 gevur eina ábending um hvussu inntekur og útreiðslur landskassans verða, um blokkstuðulin verður kapitaliseraður.

Talva 14 visir, hvussu ávirkanin verður á landskassans rakstrar-, anleggs- og útlánsúrslit, um kapitaliserað virðið júst svarar til skuld landskassans til statskassan, t.e. roknað yvir 8 ár. Av ti at tað eru landskassans inntekur og rentuútreiðslur, sum talan er um, verður beinleiðis munurin tann sami á figgjarlógini sum á gjaldsjavnanum í 1998.

Fyrsta beinleiðis avleiðingin av hesum verður, at yvirskot uppá slakar 100 mió kr verður til undirskot uppá stívliga 400 mió kr. Fyri at bota um hetta, verður neyðugt at stramma figgjarpolitikkin, við at skerja útreiðslurnar og/ella økja skatta- og avgjaldsinntekurnar ella læna til tað, sum útreiðslurnar tá eru stórri enn inntekurnar.

Onnur avleiðing verður, at í árunum eftir, skal landskassin ikki rinda avdráttir til statskassan, og tað minkar so um bruttokassaundirskotið.

Fyritreytirnar eru tær somu, sum tá roynt verður at meta um gjaldsjavnan. Sostatt er eisini galdandi í hesum hugsaða dømi, at um blokkveitingin, sum hon kann hugsast at verða 28 ár frameftir, verður kapitaliserað, statsskuldin mótroknað og restin sett í tey statslánsbrøv, sum statskassin seldi fyri at fáa pening til vega at gjalda Føroyum, broytist rakstrar-, anleggs- og útlánsúrslitið ikki stórvegis.

TALVA 14. METING UM LANDSKASSANS INNTØKUR OG ÚTREIÐSLUR 1998

Mió kr	Við blokk-stuðuli	Uttan blokk-stuðul	Munur
Inntøkuskattir	848	848	
Agjøld og tollur	962	962	
Rentuinntøkur	44	44	
Tjóðbankin	27	27	
Heildarveiting	894		-894
Inntøkur samanlagt	**2.775**	**1.881**	**-894**
Løgtingið	22	22	
Løgmansfyrisiting v.m.	43	43	
Figgjarmál v.m.	72	72	
Mentan og samskifti o.a.	174	174	
Fiskivinna	183	183	
Vinnumál o.a.	59	59	
Útbúgving, gransking o.a.	397	397	
Almanna- og heilsumál o.a.	1.167	1.167	
Útreiðslur samanlagt	**2.117**	**2.117**	**0**
Úrslit	**658**	**-236**	**-894**
Anleggsútreiðslur	78	78	
Effektiv veðhald	10	10	
Rentuútreiðslur	475	95	-380
Útlán			
Rakstrar-, anleggs- og útlánsúrslit	**95**	**-419**	**-514**

Kelda: Føroya Landsstýri

Harvið kemur landskassin at verða óbeinleiðis lánveitari til statskassan av tí peningi sum staturin skal lata Føroyum. Í staðin fyri at rinda blokkstuðul kemur statskassin hereftir so at rinda landskassanum lánsgjøld við somu upphædd, frádrigin tey av skuldarmótrokningini spardu lánsgjøld.

Fyrimunir og vansar við blokkinum

Tá nevndir verða fyrimunir og vansar við blokkinum, kann verða spurt fyrimunir fyri hvønn ella vansar fyri hvønn.

Fyri Føroyar er tað beint fram ein fyrimunur at hava eina inntøku, sum merkist, samanborið við aðrar inntøkur, og sum er við til at figgja ein livifót á ti stoði, sum Føroyar hava í dag.

Sæð yvir longri tíð kann blokkurin ella einvegis rikisveitingar verða ein bági fyri føroyska kappingarførið. Hesi viðurskifti eru lýst í 3. kapitli. Hin vegin kann inntøkan frá blokkinum figgja ílogur í infraskipan, so sum vegir og annað samskifti, ið stuðlar upp undir kappingarførið.

Fyri danir kann tað kennast sum eitt politiskt vandamál, at skula figgja ein føroyskan livifót, sum kann bera av ti danska. Hendir tað, at livifóturin í Føroyum ber av livifótinum í Danmark, kemur danska stjórnin undir trýst frá donsku almannahugsanini

um at skerja blokkin, og samstundis firnast hon føroysku reaktiónina, verður talan um at skerja blokkin.

Føroyar eru av somu orsøk í ti støðu, um búskaparlig tiltøk føra við sær munandi vøkstur í Føroyum, og livifóturin verður størri enn hjá donum, at danir fara at taka stig til at skerja blokkin. Hetta kann verða ein fordíng hjá teimum, sum leggja føroyska búskaparpolitikkin til rættis fyri at fremja tílík tiltøk.

Hetta forklárar eisini, hvi danir treyðugt vilja taka støðu til at kapitalisera blokkin fyrr enn greitt er, um olja er í føroysku undirgrundini ella ikki.

Stóra skuldin til ríkiskassan hevur við sær stórar gjaldingar; enn bara sum rentur, men seinni skal eisini skuldin rindast aftur. Í 1996 er blokkurin 860 mió kr og veksur í løtuni samsvarandi donsku inflatiónini. Rentan er um 311 mió kr, og tá skuldin til statskassan verður upp á tað niesta í 1998 verður árliga rentugjaldingin, sum sagt, 380 mió kr. Avtala er enn ikki gjord um afturrindan av skuldini. Í hesum liggur ein kredittrisiko, sum ríkiskassin hevur átikið sær við lánsveitingini til landskassan.

Tó er møguligt, at bæði føroyingar og danir hava í huganum, at verður blokkurin avtikin, minkar tilfelvingin í Føroya fólki til framhaldandi at vera í ríkisfelagsskapi við Danmark.

Av ti at gjaldingarnar, bruttostreymarnir, eru so stórir, er váðin fyri Danmarkar viðkomandi sostatt bæði á inntoku- og útreiðslusíðuni. Ein loysn verður tí, at minka um hesar bruttostreymar, og tað gerst t.d. við at kapitalisera blokkin, sum í fyrsta lagi fer sum afturgjalding av skuldini.

4.3 Samandráttur

Fyrimunir og vansar fyri Føroyar

Fyrimunirnir fyri Føroyar við eini kapitalisering verður, at meiri sannlíkt verður, at røttu búskpartiltøkini verða framd. Tað verður neyðugt, og harvið fer búskapurin at laga seg til veruligu umstøðurnar. Harumframt minkar rentukostnaðurin, eins og skuld og afturrindan av skuld minkar.

Vansar eru tengdir at, at ein inntoka fellur burtur og at gjaldsjavni og rakstrarúrslit landskassans versna, eins væl og tí at búskapurin skal laga seg til nýggjan bygnað. Hesir vansar eru tó ikki tengdir at tí, at blokkurin verður kapitaliseraður, men at tí at veitingarnar verða skerdar.

Fyrimunir og vansar fyri Danmark

Fyri Danmark kunnu fyrimunirnir samanfatast sum minking av váða og árligum útreiðslum. Tað at Danmark hevur lutfalsliga stór útlán til Føroya ger, at ein ávís kredittrisiko er. Hon fellur burtur, um útlánini falla burtur. Herumframt minkar tann politiska risikoin.

Kreditvirði landskassans verður kanska fyri stóran part ávirkað av ríkisveitingunum, men eisini tí at Føroyar eru partur av danska ríkinum. Váðin hjá Danmark fellur tí ikki heilt burtur saman við skerjing í ríkisstuðlinum, hóast hann minkar nógv.

At árliga útreiðslan til heildarveiting til Føroyar fellur burtur við eini kapitalisering, ávirkar ikki figgjarstoðuna hjá danska ríkinum. Ríkiskassin skal taka lán til tað kapitaliseraða virðið, ið rindast skal Føroyum. Í staðin fyri fyri at rinda árliga heildarveiting til Føroya, rindar ríkiskassin lánsgjold til lángevarar sínar.

Niðurstøður

Kapitalisering av blokkinum ger ikki Føroyar betri ella verri fyri. Talan verður bert um at minka tolini. Tað kann í ávísan mun sigast, at blokkurin longu er kapitaliseraður. Hann varð forútdiskonteraður, tá Føroyar settu seg í skuld og peningurin nýttur til tað, ið lánini vórðu tikin til.

Afturgjalding av verandi lánum gevur trongri gjaldføri í fyrstani og rúmari gjaldføri seinni. Hetta ger seg serliga galdandi um blokkurin verður minkaður stigvíst.

Tað er ivasamt, um danir í dag vilja kapitalisera blokkin, í ollum førum yvir eitt longri áramál. Kanska vilja teir bíða við at taka stoðu til spurningin um kapitalisering, til greiða er fingin á, um olja er í føroysku undirgrundini.

5. KAPITALSTREYMAR

5.1 Liberalisering av figgjarmarknaðum

Internationalisering av figgjar-marknaðum

Eftir fyrstu oljukreppuna í 1973 stungu stórar ójavnvágir seg upp í samhandlinum millum lond, m.a. ti at londini, sum fluttu út olju fingu stór yvirskot á gjaldsjavnanum, meðan lond, sum vóru bundin av innfluttari orku, fingu hall á gjaldsjavnanum. Lond við gjaldsjavnahalli hevdu brúk fyri figging, meðan lond við yvirskoti komu í ta støðu, at tey máttu royna at plasera figgjarognir sínar (læna út, gera ílogur) í útlondum fyri so høga rentu (avkast) sum møguligt. Hesin tørvur - plaseringar- og figgingartørvur - elvdi til viðfevnda internationalisering av figgjarmarknaðunum. Í Danmark og Føroyum kom hetta til sjóndar á tann hátt, at myndugleikar og fyritøkur nógv betur enn áður kundu finna sær lánveitarar í útlondum, sum vóru sinnaðir at veita figging.

Eftir fyrru oljukreppuna broyttu flestu lond í vesturheiminum lógir og reglur um, hvør kundi taka lán uttanlands og undir hvørjum treytum. Treytirnar hjá virkjum og privatpersónum í Danmark og Føroyum vórðu í hesum sambandi linkaðar í fleiri umforum í seinnu helvt av 70-unum og í 80-unum. Valutareglurnar, sum høvdu nágreinar ásetingar um hvat fólk og fyritokur kundu gera av ílogum og taka av lánum uttanlands og í útlendskum gjaldoyra, vórðu linkaðar í fleiri umforum. Saman við øðrum broytingum vóru hesar liður í liberalisering av figgjarmarknaðunum.

Búskapersøga

Fyri 200 árum síðan bygdi samhandil millum lond í stóran mun á sersømdir millum lond og valdsnýtslu millum hjálandaveldi og hjálond. Hinvegin var tann tíðin í mangar mátar ein byltingartíð. Teoriir um vinnuligt virksemi og samhandil millum lond, sum verða brúktar í dag, fingu sítt upprunaliga skap um tað mundi.

Gongdin hesi 200 árini hevur verið, at samhandil hevur verið á alt meira frælsum grundarlag, har kappingarforleiki hevur fingið vaksandi týdning. Tó at afturstig hava verið, so hevur hetta verið gongdin í vesturheiminum. Tey seinastu árini hevur hetta eisini verið gongdin í menningarlondum og fyrrverandi sosialistiskum londum.

Liberaliseringarnar av figgjarmarknaðum, sum eru framdar seinastu fjórðingsoldina, eru ikki stakar hendingar, men liður í tillagingum í einum alt meira samantvinnaðum heimsbúskapi.

Kaptitalmobilitetur og tapsváði

Kapitalmobilitetur og tapsváði eru avgerandi fyribrigdi fyri kapitalstreymar millum lond eins væl og inni í einum landi. Kapitalmobiliteturin ella flytiforleikin fyri kapital kann verða ávirkaður av fordingum, sum myndugleikar seta upp og av, hvussu váðilig ein íloga verður mett at vera.

Við liberalisering linka myndugleikarnir fordingarnar fyri kapitalstreymum út úr landinum og/ella inn í landið. Hesar broytingar hava lætt um altjóða samhandilin, men tær hava eisini lætt um moguleikarnar hjá íleggjarum at finna tað slagið av trygd, sum hóskar til teirra. Tað ber eisini til at fáa eina íloguspjaðing, ið sum oftast minkar um tann samlaða tapsvandan.

At meta um tapsváðan er tað sama sum at meta um kreditvirðið hjá lántakara ella ilogueyni. Mótsvarið til, at ileggjarar plasera figgjarognir í útlondum, er, at figging til innlendskt virksemi má útvegast í útlondum. Kreditvirði og figgingarkostnaður gerast ti ein meira týðandi faktorur fyri kappingarførið í landinum, so hvørt sum liberaliserað verður.

Kapitalstreymar millum Føroyar og útlond

Foroyski búskapurin hevur, sum ávíst í kapitli 2, stórt samskifti við útlond í samband við plaseringar og lántoku. Her er talan um viðskifti, sum fara fram á kapitalpostum á gjaldsjavnanum. Spurningurin um pengarenslið á kapitalpostum er eisini viðgjordur í kapitli 3 í sambandi við týdningin, sum ríkisstuðulin hevur havt fyri hitt almenna føroyska kreditvirðið.

Liberaliseringar eru eisini framdar fyri kapitalstreymar millum Føroyar og útlond, men hava gingið heldur skjótari fyri inngangandi streymar enn útgangandi. Munurin stavar fyrst og fremst frá, at foroyskir myndugleikar hava verið heldur afturhaldandi at lata føroysk virki og húsarhald seta pengar uttanfyri Foroyar, meðan treytir fyri lántoku í útlondum eru linkaðar so hvort, sum danir hava broytt sinar valutareglur.

Inngangandi kapitalstreymar

Forðingar fyri inngangandi kapitalstreymum til Foroya vórðu í stóran mun tiknar burtur í 80-unum. Í hesum sambandi gjordu bæði danskir og foroyskir myndugleikar seg galdandi. Mest týðandi atgerðirnar vórðu broytingar í valutareglunum og moguleiki fyri at taka lán frá donskum kreditfelogum.

Valutareglur

Danmark gjordi árini frá 1983 og til 1988 umfatandi broytingar/linkingar í valutareglunum. Hetta hevði við sær, at virkir og húsarhald fingu loyvi til at taka lán í útlondum uttan treytir um lántíð, og hvat lánið skuldu nýtast til. Stoðan fyri 1983 var, at bert virkir kundu taka valutalán, sum skuldu nýtast til anleggsílogur, og lántíðin skuldi í minsta lagi vera 5 ár. Nýggju donsku valutareglurnar vórðu - við ávisum seinkingum - settar í gildi í Foroyum.

Realkreditlán

Eftir heimastýrislógini er málsøkið "kreditfelog" sermál. Logtingið hevur ikki lóggivið á økinum, men virksemið hjá donskum kreditfelogum hevur verið skipað við óskrivaðum avtalum millum landsstýrið og felogini. Hesi felog fingu rætt til at økja um virksemi sítt í Foroyum árini eftir 1983, tó ikki til figging av sethúsum.

Útgangandi kapitalstreymar

Í samband við útgangandi kapitalstreymar hevur tað serliga verið foroyska tryggingarlóggávan og skattalógir um rentuinntokur og -útreiðslur, sum hava virkað avmarkandi.

Tryggingarlógir

Foroysku tryggingarfelogini, Tryggingarsambandið Foroyar og Foroya Lívstrygging, hava verið í monopolstoðu, tá ið talan hevur verið um nýtekning av tryggingum. Grundgevingarnar fyri at geva innlendskum tryggingarfelogum hendan rætt hava verið, at tann uppsparing, sum stóðst av tryggingarvirkseminum, skuldi vera verandi í Foroyum. Tryggingarfelogini hava vanliga livað upp til politisku ynskini á tann hátt, at peningur hevur verið bundin í útlán í Foroyum og á konti í føroyskum peningastovnum. Bert umr. 1% av aktivunum hjá tryggingunum vóru í 80-unum plasera uttanfyri Foroyar. Við hesum skipanum á tryggingarokinum vóru útgangandi kapitalrorslur avmarkaðar í samband við tryggingargjold hjá virkjum og húsarhaldum og sum plaseringar hjá tryggingar-

felagunum. Síðan kreppan byrjaði, hava tryggingarfelagini tó broytt íløgumynstur soleiðis, at størri partur av ognunum verður plaseraður uttanlands til tess at spjaða váða.

Skattalógir

Skattalógir hava í stóran mun virkað sum forðing fyri plaseringum hjá føroyskum virkjum og húsarhaldum uttanfyri Føroyar av tí, at avkast frá útlendskum virðisbrovum og innlánum í peningastovnum uttanfyri Føroyar hevur verið nógv harðari skattað, enn frá plaseringum á innlánskonti í føroyskum peningastovnum.[11] Føroysku peningastovnarnir hava undir hesi skipan fingið týðandi kappingarfyrimun olla monopolliknandi stoðu í samband við pengaplaseringar hjá privata sektorinum.

Lóggávan á skattliga økinum er seinnu árini tó broytt soleiðis, at avkast frá plaseringum uttanfyri Føroyar hjá virkjum verður skattað á sama hátt sum avkast frá føroyskum plaseringum. Privatpersónar gjalda tó enn nakað meiri skatt av rentum/avkasti frá útlendskum plaseringum enn í samband við avkast frá plaseringum í Føroyum.

Samantak

Forðingar fyri kapitalstreymum til og úr Føroyum eru seinastu ártíggjuni so við og við tiknar burtur. Forðingarnar vórðu tó ikki tiknar burtur við somu ferð fyri útgangandi streymar, sum fyri inngangandi.

5.2 Altjóðagerð og heimligi figgjarsektorurin

Treytir fyri kapitalstreymar

Munurin á treytum, serstakliga skattligum treytum, fyri inngangandi og útgangandi kapitalstreymar, hevur fort við sær, at nógvar búskapareindir hava havt rætt til[12] og áhuga fyri at fora kapital til Føroya, meðan bert fáar eindir í føroyska búskapinum hava havt áhuga fyri at fora kapital út úr Føroyum.

Figging í útlondum, váði í Føroyum

Føroyingar hava gjort brúk av altjóðagerðini av figgjarheiminum, sum byrjaði í fyrru helvt av 1970-árunum, við at útvega figging til landið. Sum tað eisini er lýst í kapitli 3, læntu stovnar hjá landi og kommunum við trygdum frá landskassanum, meðan privatar fyritokur læntu við eykatrygdum frá landskassanum og bankunum. Bankarnir góvu eisini donskum kreditfelagum trygdir við at geva teimum eina betri og sær sjálvum eina verri veðstoðu í bygningum.

Figgjarognir og samfelagsgjaldføri

Bæði húsarhald og privatar fyritokur settu sínar figgjarognir inn í føroyskar peningastovnar, tí at tað gav figgjarligan fyrimun. Eisini landið og stovnar hjá landinum bygdu upp figgjarognir. Hitt almenna setti eisini sínar figgjarognir í peningastovnarnar, tó at tað ikki gav figgjarligan fyrimun.

Politiskt varð tað sostatt latið upp í hendurnar á peningastovnunum, at rokja tað samfelagsliga gjaldførið. Fram til miðskeiðis í 1980-árunum fingu peningastovnarnir størri vinning av at keypa donsk lánsbrøv enn av útlánum í Føroyum. Hetta hjálpti til at skapa javnvág millum kapitalstreymin inn í landið og út úr landinum. Seinni, tá tað útlendska rentustigið fall niður um tað føroyska, og peningastovnarnir vunnu meira fyri útlán í Føroyum enn fyri figgjarílogur í Danmark, øktust útlánini eksplosivt. Peningastovnarnir medvirkaðu hesa tíðina ikki til at skapa javnvág í samfelagsgjaldførinum og búskapinum.

---

[11] Á lántokusíðuni var ikki gjordur líkmandi munur millum rentur í samband við innlendsk og útlendsk lán.
[12] ... og við landskassa- og bankaveðhaldi eisini kreditvirði til ...

Seinnu helvt av áttatiárunum var ein hørð innanhýsis kapping á føroyska figgjarmarknaðinum, sum vann á viljanum til at stýra gjaldførinum samfelagsliga. Í staðin fyri at byggja upp tiltaksgjaldfør í útlondum, viðkaðu stovnarnir um útlánini.

Samantak

Tað, at liberaliseringin varð brúkt til at fáa pengar til Føroya við lántoku, har landskassin og peningastovnarnir góvu eykatrygd, gav eina miseydnaða miðsavning av gjaldførisroktini í peningastovnunum, eins og miðsavnaðan tapsváða hjá peningastovnum og landsstýri, sum gjordist effektivur í 1992 og 1993.

5.3 Kann figgjarskipanin gerast tryggari

Broytt plaseringsmynstur

Síðan búskapurin kollsigldi í 1992-93, er peningur í nógv størri mun enn frammanundan plaseraður í útlondum, serstakliga í Danmark. Figgjarognin í útlondum varð økt við 2,5 mia kr frá 1992 til 1995, úr 3,5 mia kr upp í 5,9 mia kr. Av vøkstrinum eiga peningastovnarnir 0,9 mia kr, hitt almenna 0,8 mia kr og privatar fyritøkur og húsarhald 0,8 mia kr.

Fleiri grundir kunnu vera fyri hesum broytingum, men lat okkum nevna nakrar. Gjaldførið hjá landinum verður nú umsitið av landsbankanum, sum hevur flutt pening av landinum av gjaldførisgrundum. Tryggingarfelagini hava flutt pening av landinum fyri at økja um trygdina við spjaðing. Húsarhald og fyritøkur hava flutt pening av landinum, hóast harðari skatting, tvs. helst eisini fyri at økja um trygdina við spjaðing.

Verður hildið fast um tær hugartil gjørdu liberaliseringarnar, kunnu vit vænta, at føroyingar eisini í framtíðini fara at hava partar av sínum figgjarognum standandi í útlondum, eisini uttanum peningastovnarnar.

Kostnaður av verandi nettoskuld

Við tí rentustigi, sum er, og mynstrinum á ogn og skuld kann metast, at føroyingar lata 1% til 2% meira í miðal í rentu fyri skuldina enn teir fáa fyri ognirnar. Hesin munurin svarar til eitt árligt rentutap uppá 100 til 200 mió kr á gjaldsjavnanum.

Føroyar eru í einari millumstøðu, av tí at samfelagið er í ferð við at striða seg burtur úr kollsiglingini í 1992-93. Broytingar í samanseting av ogn og skuld kunnu tí væntast í ollum førum. Hesar broytingar kunnu kanska ávirkast av fyriskipanum frá almennari og aðrari síðu.

Figging av virksemi og kredittvirði

Mótsvarandi teimum ognum, sum føroyingar eiga í útlondum, mugu aðrir útvega figging til at reka tað búskaparliga virksemið í Føroyum. Føroyingar noydast tí at byggja upp og rokja sítt kredittvirði, bæði mótvegis føroyingum og útlendingum.

Tað kann tí vera vert at endurtaka partar av umroðuni um kreditvirði, sum var í kapitli 3. Her verður serliga hugsað um munin, sum er á privatum og almennum kreditvirði. Av tí at ein privat fyritøka kann fara á húsagang, byggir kreditvirði hennara fyrst og fremst á rentabilitetin í virkseminum og virði á hentara ognum, sum trygd. Hitt almenna kann hinvegin ikki fara á húsagang og hevur rætt til at útvega sær inntøkur við at útskriva skattir. Gjaldsevnini og kreditvirðið hjá tí almenna, byggir tí á gjaldsevnum hjá øllum samfelagnum.

Hesi viðurskifti skulu virðast, annars verður figgingarkostnaðurin hógur eins og kappingarførið verður vánaligt.

Hitt almenna

Sum oftast hevur hitt almenna tað besta kreditvirði í einum landi, og kann ti fáa tær bestu figgingartreytirnar. Í tann mun tað almenna medvirkar til at útvega figging til tað búskaparliga virksemið í landinum, eigur tað ikki at átaka sær nevnivert av tapsváða, og eigur at útvega sær góðar trygdir.

Peningastovnar

Peningastovnar eru privatar fyritøkur, sum fyrisita figgjarognir hjá innsetarum. Við lóg verða sett serstøk krøv til teirra eginogn. Teir kunnu einans átaka sær tapsváða við ti partinum av eginognini, sum er omanfyri minstukrøvini, fyri at tryggja at innsetarin fær sínar pengar aftur.

Fyritøkurnar

Hetta fórir okkum til fyritøkurnar, sum taka sær av ti vinnuliga virkseminum í samfelagnum. Skulu fyritøkurnar fáa góðar ella rímuligar somdir fyri figging av teirra virksemi, noyðist eginognin hjá fyritøkuni at vera so stór, at hon kann rúma tapsváðan, sum er knýttur at virkseminum. Váðin er sjálvandi ymiskur, eftir hvat virksemið er.

Tann føroyski búskapurin er fyri mongum skiftum í umstøðunum. Tey viðurskiftini tala fyri, at eginognin eigur at vera í stórra lagi heldur enn í minna lagi. Um eginognin er nóg stór, so kann fyritøkan halda fram, sjálvt um hon kemur út fyri tapi. Um eginognin er ov lítil, tá fyritøkan fær tap, kann alt vera mist, ti lánveitarin ikki kann góðtaka tapsváðan við framhaldi.

Tað logna er, at føroyska fiskivinnan traditionelt hevur havt lítla eginogn. Tað er lítið trúligt, at okkara hovuðsvinna fæst at verða ein sterk og kappingarfør vinna, uttan stórri eginogn. Tí verður helst eisini brúk fyri, at okkara figgjarmarknaður verður førur fyri at bjóða fyritøkum eigarakapital.

Helst verður ti brúk fyri onkrum slagi av partabrævamarknaði, har fyritøkur við at skapa sær eitt trúvirði fáa moguleika fyri at útvega kapital. Á henda hátt verður møguligt at útvega bæði útlendskan og føroyskan kapital til fyritøkur.

Samantak

Tann føroyska figgjarskipanin kann gerast sterkari, um virkini verða gjord sterkari við stórri eginogn, meðan landsstýri og peningastovnar duga at halda seg innan fyri mark, tá tey átaka sær tapsváða.

5.4 Figgjaramboð og trygging av virðum í pengarensli

Figgjaramboð

Ein av fylgjunum av, at figgjarmarknaðir alt meir eru vorðnir samanhangandi altjóða marknaðir, er, at tað er vorðið lættari at meta um og samanbera váða í ymsum londum. Hetta og menningin av teldutekni hevur gjort tað møguligt at gera figgjaramboð, sum kunnu brúkast til at minka um váða av samhandli, m.a. fyri broytingum í gjaldoyrakursum.

Eitt ótal av figgjaramboðum finnast á marknaðinum. Tey hava tað til felags, at tey eru gjord sum standardiseraðar avtalur millum partar um at býta um skyldur hjá hvørjum

øðrum ella at átaka sær skyldur móti hvørjum øðrum. Hevur tú til dømis inntøku í einum gjaldoyra og útreiðslur í einum øðrum, ber til við sovorðnari standardavtalu at býta um við mótpart, soleiðis at tú fært gjaldsskyldu í sama gjaldoyra, sum tú hevur inntøkukrav í. Tá skyldur og krøv eru í sama gjaldoyra, kanst tú ikki fáa tap av kursbroytingum.

Samhandils-mynstrið

Føroyar eru eitt lítið land við ógvuliga stórum samhandli við útlond. Hóast krepputíðina, var útflutningurin av vørum og tænastum í 1993 eini 52% av bruttutjóðarúrtøkuni, meðan innflutningurin er um 39% av BTÚ. Hesi lutfalstølini eru nakað størri nú og hetta er serliga galdandi fyri innflutningin.

Av vøruútflutningi Føroya í 1993 fóru eftir virði 83% til ES-lond, og 17% til onnur lond. Av vøruinnflutninginum komu 61% úr ES-londum, meðan 39% komu úr øðrum londum.

Frá út- og innflutninginum koma peningastreymar, inn- og útgjaldingar. Men vit hava eisini ogn og skuld í útlondum, og haðani stava gjaldingar, ið eru heimtøka, rentur og avdráttir. Peningastreymurin er ikki einans í krónum, men í fleiri ymiskum gjaldoyrum.

Virðið á gjaldoyrunum í okkara viðskiftaøkjum hava verið nakað skiftandi gjøgnum árini, og kunnu eisini væntast at verða nakað umloypandi í framtíðini, hóast ein ávísur stabilitetur hevur verið eina tíð.

Við so stórum samhandli við útlond hava samhandilsmynstrið og gjaldoyravirðini sostatt stóran týdning fyri úrslitið á gjaldsjavnanum, og somuleiðis fyri úrslitið og virksemið í landsins vinnugreinum.

Váðauppgerðir

Inntøkurnar hjá nógvum føroyskum fyritøkum verða beinleiðis ávirkaðar, tá gjaldoyru broyta virði. Útreiðslurnar verða somuleiðis meira og minni ávirkaðar av gjaldoyrabroytingum. Eisini landskassans inntøkur og útreiðslur verða ávirkaðar av hesum viðurskiftum. Tað hevði tí verið ein stórur vinningur, um tað bar til at tryggja seg soleiðis, at inntøkurnar ikki minka, uttan so at útreiðslurnar eisini minka.

Tað ber til at halda skil á, hvor váðin er. Tann, sum hevur gjaldsstreymar til og frá útlondum, eigur at gera upp nettopositiónina í hvørjum gjaldoyra sær við jøvnum millumbilum. Nettopositiónin kann gerast upp í eini talvu, har skrásett verður m.a.: (1) saldo ávísan dag, t.d. ultimo seinasta mánað, (2) inn- og útgjøld síðan ultimo, (3) útfakturerað og keyp síðan ultimo, (4) broyting í ogn og skuld síðan ultimo, (5) ogn og skuld av figgjaramboðum (terminskeyp og søla), (6) væntað søla og keyp og aðrar positiónir verða uppgjord, og (7) úrslitið er nettopositiónin.

Við at gera upp nettopositiónina fæst neyvt yvirlit yvir stoðuna og váðan. Tess fleiri handlar ein fyritøka hevur við útlond í frammandum gjaldoyrum, og tess størri upphæddirnar eru, tess neyðugari er at kenna stoðuna dagliga.

Á marknaðinum eru hópin av figgjaramboðum sum kunnu nýtast at tryggja seg móti tapi.

Dømi

Fyri at lýsa hvønn týdning samansetingin av keypi og solu, og av hesum peningastreymar ella gjaldingar hava, kann sum einfalt dømi takast samhandilin í einum ávísum gjaldoyra, eitt ávist tíðarskeið. Í hesum fortinum verður bretska pundið (GBP) nýtt sum dømi.

Ein útflutningsfyritoka ger í desember sáttmála um at selja 500 tons um mánaðin í eitt ár av hýsu og toskafiaki, ella tilsamans 6.000 tons hetta tíðarskeiðið. Fyrsta levering er 15. januar og síðani 15. í hvørjum fylgjandi mánað.

Tá sáttmálin verður gjordur, verður prísur avtalaður uppá GBP 3,00, ella 27 kr pr kg, tá kr/GBP = 9,00. Um kursurin heldur sær í avtalutíðini, er virðið av sáttmálanum 6.000.000 kg. x 27 kr. = 162 mió. kr. Møguleikar eru at kurstryggja, soleiðis at sáttmálaprísurin verður tann sami, tá avroknað verður.

Hendir tað, at kursurin á GBP broytist í tíðarskeiðinum, og kursurin ikki er tryggjaður, fæst antin meira ella minni fyri soluna, alt eftir um GBP styrknar ella gerst veikari mótvegis krónuni. Fellur GBP mótvegis krónuni, verður peningur mistur. Fellur kursurin úr 9,00, tá avtalan varð gjord, til 8,50 í miðal fyri alla soluna, verður kurstapið tilsamans: (6.000.000 kg x GBP 3,00 pr. kg. x 9,00) - (6.000.000 x GBP 3,00 x 8,50) = 9 mió. kr.

Hevur fyritokan hinvegin skuld í GBP, so minkar rentugjaldingin eisini, tá fremmanda gjaldoyrað viknar og somuleiðis møguligar afturgjaldingar.

Tá fyritokan ger avtaluna, kann hon fáa yvirskot, um fortreytirnar halda. Fær fyritokan einki gjort við útreiðslurnar ella hevur longu tryggjað seg móti kostnaðarvokstri, kann tað verða vert at tryggja seg móti virðisminking á GBP, og á tann hátt tryggja seg móti halli av avtaluni. Fyritokan eigur at hugsa um útlit, og hvar hon er viðbrekin.

Stóra skuldin og aðrar gjaldingar

Hóast rættiliga stórur partur av samhandli Føroya við útlond er í fremmandum gjaldoyra, so er nógv tann stórsti parturin av ogn og skuld Føroya í útlondum í krónum. Tó at tað ikki kann sigast nágreint, hvussu gjaldsjavnin verður ávirkaður, so er stórur vandi fyri, at inntøkurnar og útreiðslurnar á gjaldsjavnanum verða ávirkaðar ymiskt, tá gjaldoyru broytast í virði.

Tí er tað rætt at umhugsa, hvussu tað ber til at tryggja móti tapum. Figgjaramboð kunnu brúkast til hetta, men verða ikki nógv brúkt.

Hóast alt samskiftið við útlond verður brúkt til at vísa á týdningin av gjaldoyrabroytingum, so ber ikki til at tryggja tær samfelagsligu gjaldingarnar undir einum. Hvør tann, sum hevur gjaldingar í gjaldoyrum, má taka støðu til váðan út frá sínari støðu.

Í einum felag við fleiri deildum, sum hvør sær hava peningastreymar í ymiskum gjaldoyrum, er tað tó lætt at samskipa peningastreymarnar, soleiðis at nettopositiónin fyri alt virksemið verður miðsavnað. Hvørt gjaldoyra sær verður uppgjort, so fyritokan fær eina nettostøðu í hvørjum gjaldoyra sær. Hetta gevur møguleika fyri einari samlaðari váðastýring fyri alla fyritokuna.

Samhandil og váði

Sum nevnt er frammanfyri, hava føroyingar nógvan samhandil við Danmark. Innflutningsmegin kann ein av grundunum vera ynski um at sleppa undan gjaldoyrabroytingum.

Brúktu innflutningsfyritokur figgjaramboð til trygging móti kursbroytingum, høvdu tær lættari kunna broytt handilsmynstur til onnur lond.

UPPGERÐ AV, HVUSSU SAMHANDIL OG FLYTINGAR MILLUM FØROYAR OG DANMARK ÁVIRKAR VIRKSEMI Í BÁÐUM LONDUNUM

1980 í mió kr	Føroyskar útreiðslur til Danmark	Inntekugerð í Danmark	Danskar útreiðslur til Føroyar	Inntekugerð í Føroyum
Beinleiðis og óbeinleiðis inntekugerð, ið stendst av framleiðsluøking/-minking:				
1. vegna vøruhandil	***914***	***491***	***183***	***156***
Herav: vøra við seljandi landi sum upprunaland	614	419	183	156
vøra framleidd uttanfyri ríki, men keypt úr seljandi landinum	300	71	0	0
2. vegna tænastuhandil	***374***	***205***	***203***	***34***
Trygging	0	0	0	0
Ferðing og flutningur	245	136	150	26
Herav: ferðing	150	83	30	6
flutningur	95	53	120	20
Aðrar tænastur	129	69	53	8
3. vegna flytingar	***76***	***39***	***494***	***393***
Lønir, vinningur, gávur o.t.	22	22	95	95
Rentur	54	17	28	8
Danski Statsurin	0	0	352	273
Danski Tjóðbankin	0	0	19	17
4. vegna minking av alinnumari nýtslu í Danmark. Her er roknað við, at avleiðing av veitingum ríkiskassans til Føroya er tilsvarandi minni útreiðslur í Danmark		***-267***		
Beinleiðis og óbeinleiðis inntekugerð, ið stendst av framleiðsluøking/-minking	**468**		**583**	
Avleidd inntekugerð vegna privata og almenna nýtslu	**653**		**437**	
Herav: privat nýtsla	359		210	
almenn nýtsla	293		227	
Framleiðsluinntekugerð og avleidd inntekugerð tilsamans	**1.120**		**1.021**	
Framleiðsluinntekugerð og avleidd inntekugerð greinað eftir hvaðani ávirkanin stavar:				
Ávirkan frá ríkisveitingum	***-640***		***477***	
herav: beinleiðis inntekugerð í alm. framleiðslu	-267		273	
avleidd inntøka vegna privata nýtslu	-205		98	
avleidd inntøka vegna almenna nýtslu	-168		106	
Ávirkan, ið ikki stavar frá ríkisveitingum	***1.761***		***544***	
herav: inntekugerð í framleiðslu	735		311	
avleidd inntøka vegna privata nýtslu	565		112	
avleidd inntøka vegna almenna nýtslu	461		121	

UPPGERÐ AV, HVUSSU SAMHANDIL OG FLYTINGAR MILLUM FØROYAR OG DANMARK ÁVIRKAR VIRKSEMI Í BÁÐUM LONDUNUM

1988 í mió kr	Føroyskar útreiðslur til Danmark	Inntøkugerð í Danmark	Danskar útreiðslur til Føroyar	Inntøkugerð í Føroyum
Beinleiðis og óbeinleiðis inntøkugerð, ið stendst av framleiðsluoking/-minking:				
1. vegna varukandil	***1.706***	***974***	***435***	***371***
Herav: vøra við seljandi landi sum uppruna landi	1.276	872	435	371
vøra framleidd uttanfyri ríki, men keypt úr seljandi landinum	430	102	0	0
2. vegna tænastukandil	***920***	***502***	***120***	***21***
Trygging	0	0	0	0
Ferðing og flutningur	520	289	111	20
Herav: ferðing	350	194	38	8
flutningur	170	95	73	12
Aðrar tænastur	400	214	9	1
3. vegna flytingar	***1.000***	***659***	***1.188***	***829***
Lønir, vinningur, gávur o.t.	500	500	95	95
Rentur	500	159	250	76
Danski Staturin	0	0	794	615
Danski Tjóðbankin	0	0	49	43
4. vegna minking av almennari nýtslu í Danmark. Her er roknað við, at avleiðing av veitingum ríkiskassans til Føroya er tilsvarandi minni útreiðslur í Danmark		***-603***		
Beinleiðis og óbeinleiðis inntøkugerð, ið stendst av framleiðsluoking/-minking	**1.533**		**1.222**	
Avleidd inntøkugerð vegna privata og almenna nýtslu	**1.833**		**1.051**	
Herav: privat nýtsla	1.032		492	
almenn nýtsla	801		559	
Framleiðsluinntøkugerð og avleidd inntøkugerð tilsamans	**3.366**		**2.272**	
Framleiðsluinntøkugerð og avleidd inntøkugerð greinað eftir hvaðani ávirkanin stavar:				
Ávirkan frá ríkisveitingum	***-1.324***		***1.145***	
herav: beinleiðis inntøkugerð í alm. framleiðslu	-603		615	
avleidd inntøka vegna privata nýtslu	-406		248	
avleidd inntøka vegna almenna nýtslu	-315		281	
Ávirkan, ið ikki stavar frá ríkisveitingum	***4.690***		***1.128***	
herav: inntøkugerð í framleiðslu	2.136		606	
avleidd inntøka vegna privatu nýtslu	1.438		244	
avleidd inntøka vegna almenna nýtslu	1.116		277	

UPPGERÐ AV, HVUSSU SAMHANDIL OG FLYTINGAR MILLUM FØROYAR OG DANMARK ÁVIRKAR VIRKSEMI Í BÁÐUM LONDUNUM

1993 í mió kr	Føroyskar útreiðslur til Danmark	Inntøkugerð í Danmark	Danskar útreiðslur til Føroyar	Inntøkugerð í Føroyum
Beinleiðis og óbeinleiðis inntøkugerð, ið stendst av framleiðsluøking/-minking:				
1. vegna vøruhandil	***955***	***461***	***560***	***478***
Herav: vøra við seljandi landi sum uppruna landi	525	359	560	478
vøra framleidd uttanfyri ríki, men keypt úr seljandi landinum	430	102	0	0
2. vegna tænastuhandil	***450***	***244***	***200***	***35***
Trygging	0	0	0	0
Ferðing og flutningur	150	83	150	27
Herav: ferðing	90	50	75	15
flutningur	60	33	75	13
Aðrar tænastur	300	160	50	8
3. vegna flytingar	***775***	***298***	***1.455***	***1.026***
Lønir, vinningur, gávur o.t.	75	75	125	125
Rentur	700	223	285	86
Danski Staturin	0	0	1.002	776
Danski Tjóðbankin	0	0	43	38
4. vegna minking av almennari nýtslu í Danmark. Her er roknað við, at avleiðing av veitingum ríkiskassans til Føroya er tilsvarandi minni útreiðslur í Danmark		***-761***		
Beinleiðis og óbeinleiðis inntøkugerð, ið stendst av framleiðsluøking/-minking	**242**		**1.539**	
Avleidd inntøkugerð vegna privata og almenna nýtslu	**377**		**1.154**	
Herav: privat nýtsla	186		555	
almenn nýtsla	152		598	
Framleiðsluinntøkugerð og avleidd inntøkugerð tilsamans	**579**		**2.692**	
Framleiðsluinntøkugerð og avleidd inntøkugerð greinað eftir hvaðani ávirkanin stavar:				
Ávirkan frá ríkisveitingum	***-1.823***		***1.359***	
herav: beinleiðis inntøkugerð í alm. framleiðslu	-761		776	
avleidd inntøka vegna privata nýtslu	-585		280	
avleidd inntøka vegna almenna nýtslu	-477		302	
Ávirkan, ið ikki stavar frá ríkisveitingum	***2.402***		***1.334***	
herav. inntøkugerð í framleiðslu	1.003		762	
avleidd inntøka vegna privata nýtslu	770		275	
avleidd inntøka vegna almenna nýtslu	629		296	

plikatorávirkanin verið 0,5. Hevði BTÚ parturin binvegin verið líka so stórur sum ríkisstuðulin, var multiplikatorurin 1, og hevði BTÚ parturin verið hálvaaðru ferð stuðulin, so var multiplikatorávirkanin 1,5.

Input-output útrokningarnar fyri árini 1980, 88 og 93 benda á eina multiplikatorávirkan eftir stuttari tíð, sum er umleið 1,5. Minka ríkisveitingarnar við 10% av BTÚ hevur hetta við sær eina lækking av BTÚ uppá 15%. Sum frá líður fær vinnu- og prisbygnaðurin lagað seg soleiðis, at bruttotjóðarúrtokan verður stórri aftur. Hetta svarar til at langtíðar multiplikatorávirkanin frá ríkisveitingunum er minni enn 1,5.

Kreditvirðis ávirkan

Í tíðarskeiðinum 1975-89 var, tá talt verður saman, stórt hall á føroyska gjaldsjavnanum við útlond. Nettoskuldin til útlond, sum ikki var stór í 1974, vaks heilt upp í 8,5 mia kr við árslok 1989. Altjóða figgjarmarknaðurin varð latin upp hesa tíðina og føroyingar tóku ríkiliga til sín av mogulcikunum at læna keypsorku.

Hetta skeiðið vóru ílogurnar eini 33% av BTÚ. Nokur ár í 80-unum vóru tær millum 40 og 50% av BTÚ. Uppsparingin, sum framvegis var stór í altjóða hopi, minkaði nakað, so Føroyar hovdu hall á gjaldsjavnanum, sum í fleiri ár var eini 8 til 10 % av BTÚ. Ílogurnar vóru í roynd og veru ógvuliga stórar hesa tíðina og skaptu eitt virksemi, sum broytti framleiðslubygnaðin. Byggivinnan vaks nógv og aðrar vinnur, eitt nú fiskivinnan á sjógvi og landi, fingu ikki fólk. Arbeiðsfólk varð í stóran mun fingið uttaneftir. Hóast hesar stóru ílogur viknaði veksturin nógv hesa tíðina. Sostatt vóru tær stóru ílogurnar í stóran mun til fánýtis.

Frá 1975 til 1989 var ríkisstuðulin 15% av BTÚ. Millum 1983 og 1989 var lántøkan serliga stór. Ríkisstuðulin var 750 mió kr í miðal pr ár, meðan nettolántøkan var 950 mió kr í miðal. Hóast lántøkan hesa tíðina varð framd av privatum, so vóru trygdirnar bert í ávísan mun frá teimum privatu virkjunum. Í nógv stórri mun vóru tær frá landsstýrinum og peningastovnunum sum ábyrgdir.

Sum partur av ríkinum og við ríkisstuðlinum hevur landsstýrið lænt kreditvirði frá donsku stjórnini. Við veðhaldum lat landsstýrið part av hesum kreditvirði viðari til peningastovnar og privat virki.

Kreditvirðið hjá føroysku peningastovnunum var harumframt yvirmett. Hetta ov stóra álitið á peningastovnamar stavaði ma. frá, at teir vóru undir eftirliti av danska figgjareftirlitinum.

Ávirkan á kappingarføri

Grundgivið verður fyri, at stórar veitingar uttanifrá ávirka framleiðslusamansetingina, sum eisini verður nevnt um byggivinnuna og fiskivinnuna omanfyri. Serstakliga tá ið framleiðslukapasiteturin verður gagnnýttur fult, verða trupulleikar við búskaparligu javnvágini. Nýtt virksemi verður skapt av stuðlinum, og annað virksemið má leggjast niður fyri at halda javnvágina. Henda tillaging bendir oftast gjognum hækking í kostnaðarlegunni, og vinnur, har prisurin á framleiðsluni er mest týðandi kappingarparametur, koma í vanda fyri at detta niðurfyri.

almannamálum um støðuna hjá teimum brekaðu

Ár 1997, 2. desembur, gav Kristian Meginussen, landsstýrismaður, løgtingnum frágreiðing sbr. tingskipanini § 51 stk. 1, sum var soljóðandi:

Sí hevur, sum kunnugt, valt 3. desember at vera alheims handikappdagur. Hetta varð gjørt, fyri at lond um allan heim skulu hava møguleika at fylgja tí arbeiði upp, sum flest øll lond, eisini Føroyar, byrjaðu í 1981. Endamálið við degnum er, at politikkarar í øllum londum eftirmeta tað, ið gjørt er, og hvat enn liggur á lúni.

Tað er í hesum sambandi, at løgtingsformaðurin heitti á meg sum landsstýrismann í almannamálum at geva eina frágreiðing um støðuna hjá teimum brekaðu í Føroyum, og hvørjar ætlanir eru at fremja hesum viðvíkjandi.

Løgtingið skrivaði tann 3. desember 1993 undir eina áheitan frá Meginfelag teirra Brekaðu í Føroyum um at virka fyri:

1) at brekað fólk verða hoyrd og hava hvør til at taka lut í fordaskifti av máðum, sum eru ávgerandi fyri teirra lív,
2) at brekað fólk hava sama rætt til samfelagslig tilboð, sum øll onnur, og at samfelagsligar fordingar ikki verða til hindurs fyri hesum,
3) at hugsað verður um tørvin hjá brekaðum fólki í øllum almennum ætlanum,
4) at fyribyrgja og minka um árinini av menningar-, sálar-, likams- og samsabrekum eins og av viðkvæmis- og heilsuvágkrevjandi brekum, og at veittur verður stuðul og møtviðri (kompensatión) vegna brek,
5) at manglandi reglugerðir og lógir verða fyrireikaðar s.s.
   - lóg um almenna bygging til øll
   - nýggj sjúkralóg
   - lóg um vørumerking v.f.
6) at upplýsing um møguleikar og rættindi kemur út til brekað, avvarðandi, fakfólk og samfelagið, og at neyðug rádgeving stendur øllum í boði.

Aðalfundurin hjá Sameindu Tjóðum (S.T.) samtykti og lýsti 11. desember 1976, at árið 1981 skuldi vera Alheims ár teirra brekaðu. Ongantíð áður hevur so nógv verið tosað og so nógv gjørt fyri brekaðir fólkaingar sum í hesum áti. Nógvir einstaklingar og nógv felog og stovnar skipaðu fyri tiltøkum til frama fyri brekað.

Áður hevur S.T. sent út tvær kunngerðir (deklaratiónir), í 1971 deklaratión um rættindi hjá sálarliga menningarturnaðum, og í 1975 deklaratión um rættindi teirra brekaðu.

Í hesi seinnu yvirlýsing stendur sum nr. 1 ein allýsing av heitinum brekað:

> Heitið "brekað" fevnir um øll, ið ikki eru før fyri at tryggja sær, heilt ella lutvíst, eitt vanligt lív, hvørki sum einstaklingur ella í felag. Orsøkin er ófullføri, viðføtt ella ei, annaðhvørt likamligt ella sálarligt.

Víðari stendur, at einum brekaðum eigur at verða givið allar somdir samkvæmt hesi kunngerð. Hesar somdir skulu veitast øllum brekaðum uttan undantak og uttan mun til fólkaslag, lit, kyn, mál, trúgv, politiskar ella aðrar hugsanir, tjóðskaparligan ella samfelagsligan uppruna, ríkidømi o.s.fr. Heldur ikki skal gerast munur á, hvørji tey eru, ella hvørji familju tey eru av.

Endamálið við árí teirra brekaðu var at seta hesar báðar deklaratiónirnar (kunngerðirnar) í verk í øllum S.T. limaríkjunum. Ein nevnd við limum úr 23 statum varð sett sum rádgevandi hjá aðalfundinum at koma við einari umfatandi arbeiðsætlan og einari skrá, sum skuldi rokka longur enn árið 1981 at enda. Ein serlig skriv-

stova varð sett á stovn í Wien, sum skuldi savna allar endaliar. Skrivstovan sendi og tók ímóti upplýsing og tíðindum. Loysunarorðið í 1981 var: Fult luftøka og javnrættur.

Í 1993 viðtók S.T. "Standardregler om lige muligheder for handicappede". Við S.T. Standard reglunum eru politisk høvuðsendamál teirra brekaðu um javnrætt og etablering av sonn møguleikum fyri fólk við breki blivin gjørd ítøkilig í fleiri centralum samfelagsskipanum.

Til dømis áseta S.T. standardreglarnir, at tað framvegis skal gerast vart við tørv og rættindi hjá teimum brekaðu, og at tey brekaðu skulu tryggjast viðgerð, endurútbúgving og onnur stuðulstiltøk, soleiðis at tey brekaðu kunnu luttaka á jøvnum føti við onnur í samfelagnum.

S.T. standardreglarnir eru ikki bindandi eins og ein altjóða sáttmáli, men tann stoðan, teir hava fingið ígjøgnum viðtøkuna á S.T. aðalfundin, ger teir til eitt týdningarmikið reiðskap til menning av javnrætti og sonn møguleikum fyri brekað. Standardreglarnir umboðað nakrar normar og stevnumið á økinum fyri brekað, tað kann bliva altjóða siðvenjurættur, tá nógv lond bróka teir.

Danmark er sum kunnugt limur í S.T. Fyrireikingarnar til arbeiðið í samband við ár teirra brekaðu í Føroyum byrjaði við, at Ahlamtastovan sendi skriv til ta donsku stjórnina við fyrispurningi um, hvørjar ætlanir danska stjórnin hevði í sambandi við árið, og hvat kundi setast í verk í Føroyum. Í Føroyum vóru felløg og stovnar farin í gongd at fyrireika seg, og í desember 1980 varð fundur hildin í landsstýrinum, har handikappfelløgini vóru sinnað at ganga saman í ein arbeiðsbólk. Landsstýrismaðurin í almannamálum játtaði at umboða Føroyar úteftir. Arbeiðsbólkurin setti sær sum mál at kortleggja tey ymisku økini, gera upp støðuna, sum hon var, og at vísa á møguligar broytingar til tess at bøta um viðurskifti hjá brekaðum fólki og teirra avvarðandi.

MBF

Gjøgnum alt árið 1981 varð skipað fyri tiltokum, tunsavningum, fyrilestrum o.ø. um alt landið.
24. oktober 1981 varð MBF- Meginfelag fyri brekað í Føroyum- stovnað.

Endamálið, MBF setti sær, var:

- at virka fyri samarbeiði millum tey ymisku áhugafelløg teirra brekaðu í Føroyum
- at virka fyri og stuðla áhugamálum teirra brekaðu
- at arbeiða fyri at fyribyrgja brekum orsakað av sjúkum og vanlukkum
- at stuðla teimum einstøku felagunum í teirra dagliga virksemi
- at luttaka í millumtjóða samstarvi, har tyðandi avgerðir viðvíkjandi dagligu viðurskiftum borgaranna verða tiknar.

Stuðul á fíggjarlógini

Í løgtingsfíggjarlógini fyri árini 1994 til og við 1997 hevur MBF fingið 800.000 kr. í stuðul. Í 1993 fekk MBF 880.000 kr.

MBF er ein paraplyorganisatión fyri 21 limafelløg. Tær 800.000 kr. hava verið býttar javnt millum tey 21 felløgini, men nú í 1997 er avgjørt, at felløgini fáa eina grunduppheedd + gjald eftir limatalið. Hetta er ein nýggjur býtislykil, sum felløgini sjálvi hava avgjørt at seta í verk.

Harumframt fær Javni í ónniverandi árið 300.000 kr., og er sama upphæedd sett av til komandi ár.

Norðurlendska handikappráðið

Í Norðurlendska handikappráðnum (NHR), har Doris Hansen frá MBF og Jorgen Nielasen, løgtingslimur, eru limir, varð samtykt, at atkomumøguleikarnir skulu kannast í øllum norðurlendskum høvuðsstoðum. Ein virðisløn skal latast í 1998 til tann høvuðsstaðin, ið er lættast atkomiligur hjá rørsluhandikappaðum. Somuleiðis varð samtykt, at hagtøl skulu fáast til vega um m.a., hvussu nógv brekað fólk eru í arbeiði. Talan er um hag-

tøl, sum kunnu lýsa støðuna í løtuni, hvat ein hevur gjørt, og hvat ið møguligt skal gerast. Á henda hátt kunnu vit samanbera okkum við hini norðurlondini, og harvið gera meiri innan hetta økið.

Ráðið fyri brekað
Føroya Landsstýri setti í 1995 eitt ráð -Ráðið fyri brekað-, ið skal vera ráðgevandi fyri landsstýrinum í málum, ið kunnu hugsast at viðkoma brekaðum. Uppgávurnar hjá ráðnum eru at fylgja við og meta um viðurskiftini hjá brekaðum fólkum í Føroyum, við atliti til at tryggja, at tað verður víst lóskandi umhugsni til brekað í allari samfelagsráðlegging. Ásannandi, at mál, ið viðkoma brekaðum, ikki bert eru almenn mál, men samfelagsmát, eigur landsstýrið at leita sær ráð hjá Ráðnum fyri brekað í øllum málum, sum hava týdning fyri viðurskiftini hjá brekaðum í Føroyum. Aðrir almennir myndugleikar leita sær ráð hjá Ráðnum fyri brekað í málum, sum nema við livikor teirra brekaðu.

Í inniverandi árið fær Ráðið fyri brekað 50.000 kr., og eru settar 70.000 kr. av til komandi ár. Hetta er gjørt fyri at bøta um teirra møguleikar at veita ráðgeving.

Sinnisjúkralógin
Ætlanin er at leggja ta donsku lógina "Lov om frihedsberøvelse og anden tvang i psykiatrien" fyri løgtingið fyrst í komandi árt. Henda lóg skal setast í gildi í Føroyum við kongaligari fyriskipan.

Í hesum sambandi hevur lógin verið til hoyringar hjá felløgum og einstaklingum. Tann danska lógin skal tillagast føroyskum viðurskiftum.

Íbúðir
Lands og kommunalir myndugleikar skulu hugsa um fólk við serligum tørvi í sambandi við planlegging á íbúðarøkinum fyri at tryggja øllum ein rímiligan heilsugóðan bústað á fíggjarliga rímiligum støði.

Arbeiðssetningurin skal verða, at øll hava rætt til bústað, ið nøktar tørvin hjá tí einstaka.

Í samráð við Húsalánsgrunnin og íbúðargrunnin er hol sett á at gera íbúðarmarknaðin í Føroyum meira fjøltáttaðan.

Vard støv
Uppskot um broyting í forsorgarlógini er í hesum døgum lagt fyri løgtingið. Broytingin gevur møguleika fyri vardum støvum. Hetta fer at hava við sær betur arbeiðsmøguleikar hjá fólki við breki. Í staðin fyri at verða óvirkin og bert taka ímóti eini veiting, skulu tey aktiverast út frá egnum og samfelagsligum møguleikum.

Tørvskanning av fysisk brekaðum
Í 1987 gjørdi Andveikraverndin eina tørvskanning av evnaveikum og teirra viðurskiftum. Árið eftir søkti MBF um fíggjarligan stuðul at gera líknandi tørvskanning av fysisk brekaðum. Bólkurin av fysisk brekaðum er ikki ein einsnáttaður bólkur, og avgjørt varð tí at byrja kanningina við einum útvaldum bólki, og haldast skuldi síðan fram við einum bólki í senn. Avgjørt varð at byrja við bólkinum, sum ikki er føddur við brekinum, men gerst brekaður av einum skaða. Men kanningararbeiðið steðgaði, tí fleiri pengar vóru ikki til at halda fram við arbeiðinum.

Menningartarnað
Tað eru bútilboð til tey menningartarnaðu í sambýlum. Eitt er í Vági, eitt í Runavík og seks í Tórshavn. Tey menningartarnaðu hava eisini arbeiðstilboð í fleiri vardum verkstøðum. Eitt í Klaksvík, eitt í Vági, eitt í Runavík og tvey í Tórshavn. Somuleiðis eru tvey umlærttingarheim, Frítíðarheimið í Tórshavn og Dáin í Klaksvík.
Politiskt varð avgjørt, at Eirargarður skuldi tømast, og flytast skuldi út í smærri eindir. Hetta er gingið burtur

frá nú, tí tað vísir sig, at tey flestu av teimum, sum búgva í Tórsgarði í dag, krevja so mógva rækt og umsorgan, at tað tænir ongum endamáli at flyta hesar persónar, tá Eirikur Olsen nýtar tann tørv, hesi hava. Peningurin, sum settur er av í ár til íløgur innan serforsorgina, verður nýttur til keyp av tveimum húsum frá Sjálvsognarstovninum Setlutsaíbúðir. Húsini, talan er um, eru Grønlandsvegur 59 og Á Myrum 6. Húsini verða í dag nýtt til heim hjá menningartarnaðum.

Rørslutarnað

Tey rørslutarnaðu hava mógv verri viðurskifti og mest sum ongi hjálp at fáa í Føroyum í dag. Tíanverri mugu vit ásanna, at hesin bólkur veksur, ikki minst orsakað av ferðsluskaðum.

Innan fyri tey næstu árini er Hjálpitólamiðstøðin komin, sum fyrst og fremst hevur hjálpitól til rørslubrekað. Nýggir skúlar eru bygdir, og almennir bygningar hava skipað so fyri, at tey rørslubrekaðu kunnu koma inn.

Ein høvuðstrupulleiki hjá rørslubrekaðum er bústaður. Almannastovan kann játtað umbyggingar og broytingar í heiminum, men hetta er ikki nóktandi. Hesar umbyggingar eru ofta heima hjá foreldrunum hjá tí brekaða og bindur hetta tann brekaða at verða heimabúgvandi helst alt lívið. Almannastovan arbeiðir í løtuni við at betra um hesi viðurskifti, málsviðgerðin skal gerast smidligari og skjótari. Vónandi kunnu vit geva teimum rørslubrekaðu betri kor í komandi ári.

Løgtingið samtykti 13. mai í ár eina broyting til løgtingslóg um byarplanir og byggisamtyktir. Lógarbroytingin skal tryggja heimild til at gera byggireglur við serligum fyrititi til fólk, sum á ein ella annan hátt eru rørslutarnað. Víst hevur verið á, serliga frá MBF í Føroyum, at tá bygt verður, ella tá vegir og onnur tílík anlegg verða gjørd, verður ikki í nóg stóran mun tikið fyrilit til, at hetta eisini skal kunna nýtast av fólki, sum á ein ella annan hátt eru rørslutarnað. Tørvur er tí á reglum, sum áseta krøv um, at vegir og líknandi anlegg, bygningar og øki uttanum bygningar, verða gjørd soleiðis, at hetta eisini kann verða nýtt av rørslutarnaðum.

Tær fyrisitingarligu reglurnar verða gjørdar av bygdaráðnum og ásettar í byggisamtykt, hvørs gildisøki er geografiskt avmarkað til kommununa. Eisini kann landsstýrismaðurin í einari serligari byggireglugerð áseta almennar reglur. Eitt uppskot til byggireglur galdandi fyri alt landið varð í sínu tíð gjørt. Ein nevnd er sett til at koma við uppskoti um byggireglur, heruppií reglur, sum skulu setast í gildi fyri allar kommunurnar.

Kærustovuurin

Í 1993 bleiv ein almennur kærustovnur settur á stovn. Hesin kærustovnur viðger og tekur endaliga avgerð í kærumálum innan ávís øki, sum nærri eru ásett í lógini um kærunevndina. Í 1996 bleiv avgreiðsluskrivstovan hjá Kærunevndini í almannamálum løgd út til eina advokatskrivstovu sum ein fyribils loysn. Hetta var orsakað av, at kærunevndin í almannamálum í longri tíð ikki hevði virkað, og tí hava mógv gomul mál ligið á láni. Men nú verður so sókt eftir einum leiðara fyri kærustovnin, og ætlanin er, at hesin kærustovnur eisini skal taka sær av kærum innan onnur øki í tí almenna umsitingini.

Tekumálsmiðstøð

Ein teknmálsmiðstøð er eisini sett á stovn. Á teknmálsmiðstøðini er ein tulkatænasta, sum hevur tíl uppgávu:

- at undirvísa óútbúnum tulkum,
- at undirvísa tulkabrúkarum at brúka tulk, og
- at undirvísa hoyrandi, ið ynskja at samskifta betur við deyv.

Í tí nýggju lógini um Sjúkrahúsverk Føroya er nú heimild til, at sjúk børn og vaksin fáa ein avvarðandi við, tá ið tey fara av landinum til viðgerðar. Í kunngerðini um flutnings- og ferðaendurgjald til sjúklingar uttanlands stendur, at sjúkrahúsverkið er heimilað at bera ferðaútreiðslurnar fyri eitt heilsustarvsfólk og/ella ein avvarðandi. Er sjúklingurin undir 17 ár, kann sjúkrahúsverkið rinda ferðaútreiðslurnar fyri annað av foreldr-

unum ella í serligum førum fyri bæði foreldrini, umframt fyri neyðugan fylgjara.

Viðvíkjandi Serflutningsskipan fyri rørslutarnað.
Tórshavnar kommuna hevur síðan 7. juli 1992 havt eina royndarskipan við tunningi fyri rørslutarnað. Tá royndartíðin var av, avgjørdi landsstýrið tann 29 juni 1995, at skipanin skuldi halda fram og gerast varandi og víðkast kring alt landið. Stýrið fyri Serflutningsskipan Landsins, sum er samansett av einum umboði fyri landsstýrið, einum fyri MBF og einum frá tí kommunu, sum er við í skipanini, hevur gjørt eina ætlan yvir, hvussu hini økini í Føroyum kunna koma við. Niðurstøðan varð, at skipanin ikki skuldi setast í verk um alt landið tsenn, men stig fyri stig og fyrst í Norðoyggjum.

Stýrið fyri Serflutningsskipan Landsins hevur í samráð við Klaksvíkar kommunu gjørt eina reglugerð fyri Norðoyggjar, og ætlanin er nú, at skipanin í Norðoyggjum skal virka á sama hátt, sum tann í Tórshavn frá 1. januar 1998.

Framhaldandi mugu vit menna velferðar- og sosialpolitikkin fyri at tryggja teimum, ið eru ringast fyri, betri livikor.

Aðalsetningurin skal vera, at tey rørslu- og menningartarnaðu skulu mennast og gerast virkin. Tey skulu stuðlast til at taka aktivan lut í egnari menning.

Frágreiðingin varð umrøtt á tingi 3. desember 1997.

Frágreiðing frá kanningarstjóranum í spurninginum um landsstýrið hevur framt brot á § 8 í javnstøðulógini

Ár 1997, týsdagin 16. september legði løgtingsformaðurin fram soljóðandi:

FRÁGREIÐING
frá
Dánjal Magnussen, advokati
sum kanningarstjóra sambært § 38 stk. 2.
í løgtingslóg nr. 103 frá 26. juli 1995
Um stýrisskipan Føroya,
í spurninginum um Føroya Landsstýri hevur
framt brot á § 8 í javnstøðulógini í samband við
val av limum í nevndir og ráð, v.m.
á heysti 1995

1. Inngangur
Í skrivi dagfest tann 4. oktober 1996 útnevnir løgtingsformaðurin sambært § 38 stk. 2 í Løgtingslóg nr. 103 frá 26/7-1994 um Stýrisskipan Føroya advokat Dánjal Magnussen til sum kanningarstjóra "... at liða greiðu á, um landsstýrið hevur framt brot á § 8 stk. 1 í Løgtingslóg nr. 52 frá 3. oktober 1994 um javnstøðu millum kvinnur og menn, tá val av nevndum og ráðum fór fram í oktober 1995."

Javnstøðunevndin hevur í skrivi dagfest 7. februar 1996 kært landsstýrið inn fyri Landsstýrismálanevndina fyri brot á § 8 stk. 1 í javnstøðulógini (sí s. 15 og 16), tá landsstýrið valdi menn í kæruni tilskilaðar nevndir og ráð (sí s. 3 til 9). Í hesum sambandi heitti Landsstýrismálanevndin í skrivi dagfest 10. juli 1996 á løgtingsformannin um at seta ein kanningarstjóra til at greiða málið, og geva løgtinginum ta í lógini ásettu frágreiðing hesum viðvíkjandi.
Kanningarstjóra hevur kannað gongdina í sambandi við, at Føroya Landsstýrið setti nevndir og ráð í oktober

1995. Harumframt hevur kanningarstjórin kannað gongdina í sambond við, at landsstýrið tann 28. september 1995 setti tær nevndir og tey ráð, ið Javnstøðunevndin nevnir í kæru síni. Løgtingsformaðurin tilnevnir kanningarstjóran júst vegna kæru frá Javnstøðunevndini um nevndar- og ráðsval, farin eru fram 28. september 1995, og varð makaskjal av hesi kæru lagt við tilnevningaskrivinum. Kanningarstjórin hevur tí mett valini 28. september 1995 sum part av kanningararbeiðinum, hóast tilnevningarskrivið hert nevnir val farin fram í oktober 1995.

Kanningarstjórin hevur gjøgnumgingið skjalatilfar útflýggjað frá løgtingsskrivstovuni, landsstýrismálanevnd løgtingsins og landsstýrinum. Harumframt hevur kanningarstjórin sett fyri kanningina viðkomandi fólki ymsar skrivligar spurningar at svara. Løgmaður Edmund Joensen, landsstýrismenninir Eilif Samuelsen og Ivan Johannesen, fyrrverandi landsstýrismenninir Andrias Petersen, Óli Jacobsen og Axel H. Nolsøe og fulltrúi Súsanna Nolsøe, hava soleiðis fingið fyrispurningar og hava hesi valt at svara skrivligu spurningum munnliga á fundum við kanningarstjóran. Kanningarstjórin hevur í frágreiðing síni dripið fram og endurgivið "essensin" í hesum samrøðum. Javnstøðunevndin hevur eisini fingið spurningar at svara og hevur hon valt at svara spurningunum skrivliga, og er hetta svar endurgivið í frágreiðingini.

II. Nevndarval fevnd av kanningini

Sambært gerðabókini hjá landsstýrinum, so hevur landsstýrið tann **28. september 1995** og í **oktober 1995** valt hesar limir í nevndir og ráð v.m.:

Tann **28. september 1995** hevur landsstýrið samtykt at velja hesar limir í niðanfyri tilskilaðu nevndir, ráð, v.m. (sitat úr gerðabók landsstýrisins):

"Umboðsráð í Tryggingarsamhandið:
1. Jákup Suni Lauritsen, Sørvágur
2. Guðmund Mortensen, Tvøroyri
3. Mamy Dahl Sørensen, Viðareiði
4. Petrhjørg Jensen, Tórshavn
5. Demmus Hentze, Tórshavn
6. Knút Nygaard, Tvøroyri
7. Hildur Paturssen, Tórshavn

Nevnd í Tryggingarsambandið:
1. Sólgerð Joensen, Klaksvík
2. Hilmar Kass, Tórshavn
3. Tóralvur Mohr Olsen, Sandi
4. Jógvan Durhuus, Vestmanna
5. Umboðsráðið velur

Umsjón við Tryggingarsambandinum:
1. Jutta Midjord, Tórshavn
2. Ernst Hansen, Tórshavn

Umsjón við Føroya Lívstrygging:
1. Ingibjørg Berg, Tórshavn
2. Eydun Videro, Sandi

Yvirprísráð:
1. Birita Weihe, Tórshavn
2. Sigrid Dalsgaard, Hoyvík
3. Dánjal Magnussen, Tórshavn

Menningargrunnurin:

1. Niclas Foldbo, Toftir
2. Sverri Hansen, Leirvík
3. Julius Poulsen, Klaksvík
4. Ólavur Samson, Klaksvík
5. Terji Vestergaard, Saltangará

Varalimir:
1. Súsanna Olsen, Klaksvík
2. Helena Eliasen, Toftir
3. Schuman Hansen, Klaksvík
4. Martin Nielsen, Vatnsoyrar
5. Hans P. Højgaard, Rituvík

Sjónvarpsnevnd:
1. Johan Petersen, Glyvrar, formaður
2. Lutjen Apol, Tórshavn
3. Hans Jørgensen, Miðvágur
4. Dánjal P. Danielsen, Velbastaður
5. Kristianna Rein, Tórshavn

Varalimir:
1. Beata L. Jensen, Tórshavn
2. Sheila Arnskov, Tórshavn
3. Elin Jacobsen, Vági
4. Levi Nielasen, Hvalba

Útvarpsnevnd:
1. Johan Petersen, Glyvrar, formaður
2. Hans Jacob Lambauge, Lamba
3. Dan Petersen, Fuglafirði
4. Steingrim Niclasen, Tórshavn
5. Osla Sevdal, Streymnesi.

Varalimir:
1. Beata L. Jensen, Tórshavn
2. Selinda í Heiðunum, Runavík
3. Elsa Birgitta Egholm, Glyvrar
4. Guðrun Øregaard, Kollafirði
5. Heini Lützen, Tórshavn

Sjúkrahússtýri:
Landssjúkrahúsið:
1. Niels Joensen, Kvívík
2. Lilian Isaksen, Kvívík
3. Karolina Petersen, Tórshavn
4. Birgir Waag Høgnesen, Vestmanna
5. Kristianna Rein, Tórshavn

Varailmir:
1. Lis Guttesen, Tórshavn
2. Eydun Ellendersen, Tórshavn
3. Ernst Kass, Tórshavn
4. Bergur Dam, Tórshavn

Klaksvíkar sjúkrahús:

1. Poul Martin Rasmussen, Klaksvík
2. Dora Joensen, Húsar
3. Karl Heri Joensen, Klaksvík
4. Símun Petur Hjelm, Klaksvík
5. Rúna Sivertsen, Klaksvík

Varalimir:
1. Eyðfinn Hansen, Klaksvík
2. Anna Berjastein, Fuglafirði
3. Jákup Pauli Sundskarð, Klaksvík
4. Noomi Nielsen, Klaksvík
5. Kristian Fr. Olsen, Klaksvík

Suðuroyðar sjúkrahús:
1. Flemming Mikkelsen, Vági
2. Jóhan í Smiðjuni, Fámjin
3. Kai Ljósstein, Porkeri
4. Jónhild Kjærbo, Vági
5. Hergeir Nielsen, Leiti

Varalimir:
1. Kirsten Petersen, Porkeri
2. Kári Jacobsen, Vági
3. John Berg, í Nesi
4. Jákup Jensen, Tvøroyri

Ráðleggingarnevnd fyri Sjúkrahúsverkið:
1. Flemming Mikkelsen, Vági
2. Símun Petur Hjelm, Klaksvík
3. Kristian Fr. Olsen, Klaksvík
4. Hanna Joensen, Tórshavn
5. Aibritt á Plógv, Sandavági

Vanlukkutryggingarráðið:
1. Terji Davidsen, Kollafirði
2. Hanna Lisberg, Tórshavn
3. Helena Samuelsen, Hoyvík
4. Sorinskrivarin
5. Landslæknin

Varalimir:
1. Lydia Laksafoss, Miðvágur
2. Johann Samuelsen, Tórshavn
3. Karsten Hansen, Klaksvík

Húsalánsgrunnurin:
1. Gunni Ellendersen, Tórshavn
2. Johan Mortensen, Tórshavn
3. Hans Trygvi Henriksen, Tórshavn

Varalimir:

1. Vagn Erik Michelsen, Tórshavn
2. Niclas Mikkelsen, Syðrugøta
3. Martin Simonsen, Fuglafirði

Landsskúlaráðið:
1. Niels Nattestad, Tórshavn, formaður
2. Edvard Olsen, Tórshavn
3. Eydgunn Samuelsen, Klaksvík
4. Jógvan á Lakjuni, Fuglafirði
5. Reinhold Nielsen, Tvøroyri

Varalimir:
1. Turid Olsen, Sandavágur
2. Alis Jacobsen, Haldarsvík
3. Finn Thomsen, Tvøroyri
4. Jákup Mikkelsen, Klaksvík
5. Niels Petur Nolsøe, Vági

Skógfriðingarnevndin:
1. Ejler Djurhuus, Trongisvágur
2. Johann Mortensen, Tórshavn
3. Árni Olsen, Tórshavn
4. Birgit Arge, Tórshavn
5. Sigga Rasmussen, Tórshavn

Varalimur:
2. Einar Waag, Klaksvík

Jarðarráðið:
1. Annfinn Brekkstein, Velbastað
2. David Hansen, Kvívík
3. Dánjal Joensen, Kollafirði
4. Jákup Petersen, Viðareiði
5. Petur Karl á Ranai, Tvøroyri

Varalimir:
1. Zacharias Beck, Porkeri
2. Dánjal J. í Brekkunum, Hósvík
3. Jákup Højdesgaard, Eiði
4. Óla Kr. Debes, Oyrareingir
5. Petur Jacobsen, Søldarfirði

Landbúnaðarstevna:
Norðoya sýsla:
1. Justines Poulsen, Hvannasund
2. Arnold Højgaard, Klaksvík
3. Michael Matras, Klaksvík
4. Jákup Monrad Joensen, Húsar
5. Páll Østerø, Trøllanesi
6. Samson Samson, Viðareiði

Eysturoyar sýsla:

1. Kirstin Olsen, Toftir
2. Jákup Lambhuge, havnarmeistari, Saltangará
3. Áslakkur Hansen, Norðagøta
4. Arnold Olsen, Ritavík
5. Líggjas Hansen, Norðagøta
6. Petur Skeel Skarðsá, Funningi

Streymoyar sýsla:
1. Adrian í Hoyrum, Kollafirði
2. Súsanna Joensen, Kvívík
3. Andreas Højgaard, Vestmanna
4. Símun P. Jacobsen, Vestmanna
5. Tummas Eikholm, Hvalvík
6. Vilhjálmur Patursson, Tórshavn

Vága sýsla:
1. Sólrun í Eydansstovu, Sandavágur
2. Osmund Joensen, Sandavági
3. Gudmund Nielsen, Miðvági
4. Kári á Lofti, Sandavágur
5. Karlo Joensen, Miðvági
6. Andreas Berglíð, Sørvágur

Sandoyar sýsla:
1. Edmund Nielsen, Skopun
2. Birgir Mohr, Sandi
3. Arnfinnur Johannesen, Dali
4. Regin Sørensen, Húsavík
5. Karlon R. Winther, Skopun
6. Jonna Fystbú, Sandi

Suðuroyar sýsla:
1. Niels Pauli Olsen, Hvalba
2. Kirstin Petersen, Porkeri
3. Hans Olaf Andersen, Lopra
4. Leif Lisberg, Vági
5. Hermund Michelsen, Øravík
6. Johannes Enni, Tvøroyri

Landsbankin:
1. Kristina Jensen, Tórshavn
2. J. H. Svabo Samuelsen, Klaksvík
3. Regin Olsen, Tórshavn
4. Arnfinn Hansen, Kaldbak
5. John Danielsen, Argir

Býarskipanarnevndin:
1. Jóannes Madsen, Tórshavn, formaður
2. Jóannes Dalsgarð, Velbastað
3. Ólavur Clementsen, Tórshavn
4. Arnstein Niclasen, Hoyvík

5. Trygvi Gottesen, Tórshavn
6. Partur Joensen, Fuglafirði
7. Jens M. Dalsgaard, Glyvrar

Tann **3. oktober 1995** hevur landsstýrið samtykt at velja Emil Olsen, Eiði, sum lim og Berg í Garði, Tórshavn, sum varalim í Sjónvarpsnevndina eftir tilráðing frá lurtarafeløgunum. Harumframt samtykti landsstýrið á hesum fundi at velja Jógvan Friðriksson, Innan Glyvur, sum lim og Heina E. Petersen, Sandavági, sum varalim í Útvarpsnevndina eftir tilráðing frá lurtarafeløgunum.

Tann **10. oktober 1995** hevur landsstýrið samtykt at velja Sinnun W. Arge og Dorete Bloch sum varalimir í Náttúrufriðingarnevndina og at velja Jógvan Lytzen sum lim í nevndina hjá Tryggingarsambandinum Føroyar í staðin fyri Jógvan Durhuus.

Tann **17. oktober 1995** hevur landsstýrið samtykt at velja Birgir Høgnesen sum lim og Óla Simonsen sum varalim í Skrásetingareftirlitið.

Tann **24. oktober 1995** hevur landsstýrið samtykt at velja Niclas Foldbo sum formann og Súsonnu Olsen sum varalim í Menningargrunnin, at velja Bjarna Vilhelm sum formann og Petur Alberg Lambhauge sum varaformann í Fiskivinnusturvsnevndina, at velja Jens Nordberg, Hvalba og Lisu við Reiðlið, Tvøroyri sum varalimir í stýrið fyri Suðuroyar Sjúkrahús. Samtykt varð samstundis at velja Karolina Petersen sum lim í Ráðleggingarnevndina fyri sjúkrahúsverkið, umframt Hergeir Nielsen sum varalim í Sjónvarpsnevndina.

Tann **31. oktober 1995** hevur Føroya landsstýri samtykt at velja Torbjørn Poulsen, Karin Kjølbro og Óla Mittún Petersen sum umboð í stýrið fyri Norðurlandahúsið í Føroyum.

III. Skjalatilfar í málinum annars.
Úr kannaða skjalatilfarinum vil kanningarstjórin taka fram hesi skjøl:

Í skrivi dagfest **27. september 1995** frá Javnstøðunevndini til Føroya Landsstýri, innstemplað í journaldeildini hjá Føroya Landsstýri **11. oktober 1995,** heitir Turið Debes Hentze, forkona í Javn-støðunevndini á Føroya Landsstýri um, nú nýggjar nevndir og ráð skulu veljast, at senda Javnstøðunevndini eitt yvirlit, sum sýnir, hvussu hesi verða mannað, og annars so hvørt sum landsstýrið tilnevnir fólk sum alment umboð í nevndir, ráð, stýri og grunnar og tílíkt, samstundis at kunna Javnstøðunevndina.
Javnstøðunevndin sendir til Føroya Landsstýri skriv dagfest hin **2. november 1995,** í journaldeild landsstýrisins innstemplað tann **3. november 1995,** ið er soljóðandi:

"Við skrivi til Føroya Landsstýri tann 27. september 1995 heitti javnstøðunevndin á Føroya Landsstýri um at kunna javnstøðunevndina um, hvørjir nevndarlimir vórt valdir í tey ymisku ráð og stýri, sum landsstýrið velur, eins og eisini verður heitt á landsstýrið um at kunna nevndina um, tá grunnar og tílíkt, sum landsstýrið hevur umboðan í, verða vald.

Frá landsstýrinum hevur Javnstøðunevndin fingið sendandi yvirlit yvir val av nevndum. Einki skriv fylgdi við, sum greiddi frá, hvussu og nær valið fór fram, men má roknast við, at hetta hevur verið síðst í september ella fyrst í oktober mánaða.

Av yvirlitinum yvir nevndirnar, sum eg hevi mær at hjáleggja í avrit við átekning um býti millum kvinnur og menn skilst, at **tað** er uttanfyri einhvønn iva, at grein 8, stk. 1, í javnstøðulógini, harav framgongur, at **"allar almennar nevndir, ráð, umboð og líknandi... skulu verða sett saman soleiðis, at umleið eins nógvir limir av báðum kynum eru umboðaðir....."** er brotin.

Við gjøgnumgongd av yvirlitinum yvir nevndirnar er serliga at viðmerkja, umframt at yvirvág av mannfólki

er í øllum nevndum/ráðum, at :

- Yvirvágin er størri, enn lógin heimilar
- Í onkrum nevndum eru eingi konufólk, heldur ikki sum eykalimir, sí t.d. Jarðarráðið og Býarskipanarnevndina.
- Í urðum nevndum eru eingi konufólk sum nevndarlimir, men tó sum eykalimir.
  Aftur í øðrum nevndum er yvirvág av mannfólki í sjálvari nevndini, meðan konufólkini hava yvirvág sum eyka nevndarlimir, sí t.d. Sjónvarps-/útvarpsnevnd.

Omanfyri nevnda man vera nóg mikið til tess at gera landsstýrinum greitt, at nevndarvalið illa kann sigast at vera í tráð við javnstøðulógina, og loyvir javnstøðunevndin sær at vísa á, at nevndin onga áheitan hevur fingið frá landsstýrinum um møguligt undantaksloyvi, jbr. grein 8, stk. 2.

Føroya Landsstýri hevur eftir nevndarinnar áskoðan brotið lógina um javnstøðu millum kvinnur og menn, og verður tí við hesum beitt á Føroya Landsstýri um at fáa lógarbrotið rættað inn 2 vikur, jbr. grein 11, stk. 2 í sonu lóg.

Víst verður samstundis longu nú á § 12 stk. 1 og pkt. 4, har víst verður á, at um ein stovnur ella myndugleiki brýtur lógina, verður álagt viðkomandi yvirskipaða stovni at fáa viðurskiftini í rættlag.

Í hesum føri er tað landsins hægsti myndugleiki, sum brytir lógina, og átti at verið óneydugt, at javnstøðunevndin skal átala slíkum."

Tá Javnstøðunevndin einki svar fekk, sendir hon skriv aftur til Føroya Landsstýrið dagfest hin **20. november 1995,** í journaldeild landsstýrisins innstemplað tann **23. november 1995,** ið er soljóðandi:

"Javnstøðunevndin loyvir sær við hesum at minna á skriv nevndarinnar til Føroya Landsstýri dagfest 2. november 1995 hjálagt yvirlitt yvir val av nevndum og ráðum við viðmerkingum.

Vísandi til grein 11, stk. 5 og grein 12, 4. pkt. í lógini um javnstøðu varð heitt á Føroya Landsstýri um at fáa greitt viðurskiftini viðvíkjandi vali av nevndum og ráðum, soleiðis at hesi vóru í tráð við lógina.

Javnstøðunevndin loyvir sær tí við hesum enn einaferð at heita á landsstýrið um at fáa rættlag á hesum viðurskiftum og vísir á, at landstýrið sum hægsti útinnandi myndugleiki í landinum eisini skal fylgja lógum landsins, og verður samstundis víst á løgtingslóg um stýriskipan Føroya grein 37 og 38 um eftirlit við, at starv landsstýrisins verður útint á lógligan hátt.

Javnstøðunevdin væntar at frætta innan eina viku frá Føroya Landsstýri, hvørji stig nú verða tikin til at fáa rættlag á hesum viðurskiftum.

Samstundis loyvir nevndin sær at minna á sama skriv, har verður heitt á Føroya Landsstýri um at kunna javnstøðunevndina um, hvørjar nevndir, ráð og grunnar annars eru, sum landsstýrið ella tað almenna á einhvønn hátt hevur umboðan í."

Í skrivi dagfest tann **22. november 1995** til løgmann og landsstýrismenn greiðir fulltrúi á Almenna- og Heilsudeild landsstýrisins soleiðis frá:

"**Til løgmann og landstýrismenn.**
Viðvíkjandi skrivi frá Javnstøðunevndini dagfest 2. november 1995.

Í skrivi frá javnstøðunevndini, sum verður lagt við, ger javnstøðunevndin vart við, at eingin ivi er um, at Føroya landstýri hevur brotið javnstøðulógina grein 8, stk. 1, tá val av nevndarlimum í tey ymisku ráð og

stýrir er farin fram.

Harafturat vísir javnstøðunevndin á, at javnstøðunevndin onga áheitan hevur fingið frá landsstýrinum um møguligt undantaksloyvi.

Til síðst verður víst til grein 12, stk. 1 og pkt. 4 í javnstøðulógini, har sagt verður, at um stovnur ella myndugleiki brýtur lógina, verður álagt viðkomandi yvirskipaða stovni at fáa viðurskiftini í rættlag.

Sagt verður frá hesum."

Í skrivi dagfest hin **7. desember 1995** setir Almanna- og Heilsudeildin í Landsstýrinum upp hesa frágreiðing til landsstýrisfund viðvíkjandi skrivi frá Javnstøðunevndini:

"Viðvíkjandi skrivi frá javnstøðunevndini
Javnstøðunevndin ger vart við, at eingin ivi er um, at Føroya Landsstýri hevur brotið javnstøðulógina grein 8, stk. 1, tá val av nevndarlimum er fari fram.

Javnstøðunevndin vísir til grein 11, stk. 5 og grein 12, 4. pkt. í lógini um javnstøðu (sum verður løgd við) og heitir við hesum á landsstýrið, um at fáa greiðu á viðurskiftum viðvíkjandi vali av nevndum og ráðum soleiðis, at hesi eru í tráð við lógina.

Sambært § 8, stk. 2 kann javnstøðunevndin, tá ið serligar grundir eru fyri tí, geva undantaksloyvi í hvørjum einstøkum føri ella fyri eina yrkisgrein sær.

Tilmæli:
Almanna- og heilsudeildin mælir tí landsstýrinum til at søkja javnstøðunevndina um undantak sambært grein 8, stk. 2 í javnstøðulógini fyri tað val av nevndarlimum, ið longu er fari fram, og sum ikki eru í tráð við lógina."

Nevnda skriv dagfest 7. december 1995, ber hetta árit:

"Viðgjørt á landsstýrisfundi tann 9/1 - 1996 nr. 0
Deild: útsett til gjøllari frágreiðing"

Einki framgongur tó av gerðubók landsstýrsins fyri fund 9. januar 1996 um hetta mál.

Í innanhýsisskrivi frá Axel H. Nolsøe, landsstýrismanni til Eilif Samuelsen og Andrias Petersen, landsstýrismenn dagfest **18. januar 1996,** verður sagt soleiðis frá:

"Viðv. átalu frá javnstøðunevndini um val til nevndir og ráð.

Tá hetta mál var fyri á landsstýrisfundi var avgjørt, at landsstýrismenninir Eilif Samuelsen og Andrias Petersen skuldu finna eina loysn, sum kundi nøkta javnstøðunevndina. Antin at finna fram til eitt javnari kynsbýti, og/ella koma við einari frágreiðing um hví hetta ikki kann lata seg gera sum grundarlag fyri at biðja javnstøðunevndina um undantaksloyvi.

Søknast verður eftir svarinum."

Á landsstýrisfundi hin **1. februar 1996,** varð samtykt uppskot til skriv til Javnstøðunevndina um val av nevndarlimum o.t. Axel H. Nolsøe tók ikki undir við samtyktini.
Skriv dagfest hin **1. februar 1996** verður sent frá Almanna- og Heilsudeild landsstýrisins, undirskrivað av

Axel H. Nolsøe, landsstýrismanni, til Javnstøðunevndina, og er hetta soljóðandi:

"Javnstøðunevndin hevur við skrivið dagfest 27. september 1995 og eina áminning seinri dagfest 20. november 1995 spurt um, hvussu Føroya landsstýri velur sínu almennu umboð í nevndir, ráð, stýrir og grunnar, og har átalað verður, at landsstýrið ikki yvirheldur javnstøðulógina í hesum vali av nevndarlimum o.ø.

Landsstýrið hevur í høvuðsheitum fylgt tí politiska býtinum av nevndarlimum, sum tingmanningarnar hjá teimum ymsu flokkunum í samgonguni og í andstøðuni vóru komin ásamt um fyrst eina ferð, og so um einaferð, eftir at gjørt varð vart við, at býtislutfallið millum kvinnur og menn ikki líkaði ásetingarnar í javnstøðulógini.

Tá landsstýrið skuldi velja nýggj umboð í nevndir, ráð o.t., lat landsstýrið sum heild sitandi nevndarlimir/-ráðslimir vera tey/teir somu sum vóru, tí í fleiri førum skulu helst bæði nevndir, stýri og ráð avtakast ella nýggj lóg setast í verk á økinum áðrenn ólavsøku 1996.

Dømi um hesi eru Tryggingarsambandið, har nýggj lóg í lotuni verður tilevnað, Menningargrunnurin sum í dag bert umsitir fyrrverandi útlán og tí er neyðugt við kontinuiteti í nevndini, sjónvarp og útvarp, har nýggj lóg verður tilevnað, landsskúlaráðið og sjúkrahússtýrini, har stórar broytingar verða og møguliga verða hesi avtikin á Ólavsøku 1996.

Í valinum av limum til ráð og nevndir hevur tað ikki verið gjørligt at ganga ásetingunum í javnstøðulógini nóg mikið á møti serliga í teimum nevndunum, sum skuldu veljast fyri 1. oktober. Landsstýrið fer, tá ið limir skulu veljast í nevndir og ráð í framtíðini at syrgja fyri, at treytirnar í javnstøðulógini verða hildnar.

Í teimum førum ið ikki hevur verið møguligt at lokið ásetingarnar í lógini vil landsstýrið hervið sambært § 8, stk. 2 í javnstøðulógini søkja javnstøðunevndina um undantakstoyvi."

Hetta skriv stendur í journal landsstýrisins, skrásett soleiðis:

"Reg. dato 06-02-1996, UTGBR"
Í skrivi dagfest **7. februar 1996,** í journal hjá løgtingsskrivstovuni skrásett **12. februar 1996,** vendir Javnstøðunevndin sær til landsstýrismálanevndina við fylgjandi:

"Javnstøðunevndin harmast um, at landsstýrið, sum landsins hægsti myndugleiki undir løgtinginum, so grovliga hevur brotið løgtingslógina nr. 52 frá 3. mai 1994 um javnstøðu millum kvinnur og menn, sum landsstýrið gjørdi, tá tað í oktober í fjør valdi limir í nevndir og ráð og ikki fylgdu lógini, har ásett er soleiðis í

§ 8 stk. 1:
".. allar almennar nevndir, ráð, umboð og líknandi .... skulu verða sett saman soleiðis, at umleið eins nógvir limir av háðum kynum eru umboðaðir ...."

Hjálagt verður avrit av skrivi til landsstýrið dagf. **2. november 1995,** við hjátøgdum yvirliti yvir valdar nevndir og ráð, sum vísir, umframt at yvirvág er av mannfólkum í flestu nevndum, at:

- Í onkrum nevndum eru eingi konufólk yvirhøvur, hvørki sum nevndar- ella eykanevndarlimir, sí t.d. Jarðarráðið og Býarskipanarnevndin.
- Í øðrum nevndum eru eingi konufólk sum nevndarlimir, men tó sum eykalimir, t.d. Menningargrunnurin.
- Aftur í øðrum nevndum er yvirvág av mannfólki í sjálvari nevndini, meðan konufólkini hava yvirvág sum eykanevndarlimir, sí t.d. Sjónvarps-/útvarpsnevnd.

Í sama skrivi varð eisini víst á, at javnstøðunevndin ikki hevði fingið nakra áheitan frá landsstýrinum um

undantaksloyvi sambært lógini

§ 8, stk. 2:
"Tá serligar grundir eru fyri tí, kann javnstøðunevndin geva undantaksloyvi í hvørjum einstøkum føri ella fyri eina yrkisgrein sær."
Javnstøðunevndin hevði roknað við, at landsstýrið sum landsins hægsti myndugleiki undir løgtinginum, og sum er tann yvirskipaði myndugleiki, sum klagast skal til, um stovnar og myndugleikar annars gera lógarbrot, skjótast gjørdi tað neyðugt til tess at rætta hetta mistak sítt.

Men landsstýrið gjørdi einki, hvørki valdi av nýggjum ella søkti um frávik vísandi til serligar grundgevingar fyri ikki at halda lógarkravið. Einki frættist úr landsstýrinum.

Tann **20. nov. 1995** sendi javnstøðunevndin tí enn eitt skriv til landsstýrið, minti á málið og vísti á, at javnstøðunevndin metti hetta brot so álvarsligt, at neyðugt var at minna landsstýrið á løgtingslógina um Stýrisskipan Føroya §§ 37 og 38 um eftirlit við, at starv landsstýrisins verður útint á lógligan hátt:

> § 37
> "Løgmaður og landsstýrismenn hava rættarliga ábyrgd av fyrisitingini av teim málsøkjum, sum løgd eru til teirra. Mál viðvíkjandi hesi rættarligu ábyrgd verða at áseta við løgtingslóg.
>
> § 38
> Løgtingið setur eina tríggja manna nevnd av løgtingsmonnum at hava eftirlit við, at starv landsstýrisins verður útint á løgligan hátt.

Stk. 2. Hevur nevndin illgruna um, at óregluliga hevur verið atborið, kann hon krevja, at løgtingsformaðurin setur ein kanningarstjóra ..... at gera eina frágreiðing til løgtingið .....".

Støðan er framvegis tann sama. Landsstýrið letur ikki við seg koma.

Javnstøðunevndin vendir sær tí nú til løgtingsins landsstýrismálanevnd við áheitan um, at nevndin tekur hetta mál til viðgerðar og skjótast tekur tey stig sum lógin ásetir og vendir sær til løgtingsformannin til tess at seta ein kanningarstjóra, sum kann greiða hetta mál og geva løgtinginum tað í lógini ásettu frágreiðing."

Skriv dagfest hin **2. apríl 1996** sendir Landsstýrismálanevndin til Føroya Landsstýri, og er hetta soljóðandi:

"Kæra frá javnstøðunevndini
Hjálagt verður avrit av kæru, ið landsstýrismálanevndin hevur fingið frá javnstøðunevndini dagfest 7. februar 1996, viðv. § 8, stk. 1, í løgtingslóg nr. 52 frá 3. mai 1994, ið ásetir, at

" Allar almennar nevndir, ráð, umboð og líknandi, sum løgtingið og bý- og bygdarráðini útnevna, tá ið tey, ið útnevnast skulu, ikki nýtast at vera løgtings- ella bý-/bygdarráðslimir."

Áðrenn løgtingsins landsstýrismálanevnd tekur málið til viðgerðar, verður heitt á Føroya Landsstýri at koma við eini frágreiðing innan 14 dagar viðv. omanfyrinevndu kæru."

Tá onki svar kemur frá landsstýrinum, verður rykt eftir svari í skrivi dagfest tann **29. maj 1996**, ið er soljóðandi:

"Viðv. kæru frá javstøðunevndini.
Landsstýrismálanevndin hevur í skrivi dagfest 2. apríl 1996 heitt á Føroya landsstýri, um at koma við eini frágreiðing viðvíkjandi kæru frá javnstøðunevndini, viðvíkjandi § 8 stk. 1 í løgtingslóg nr. 52 frá 3. mai

1994. (avrit hjálagt)

Freistin fyri svari er farin og neyðugt er hjá landsstýrismálanevndini at fáa eina frágreiðing um gongdina í málinum, áðrenn kæran kann viðgerast.

Heitt verður tí einaferð enn á Føroya landsstýri at koma við umroddu frágreiðing skjótast gjørligt."

Í skrivi dagfest hin **26. juni 1996,** í joornal løgtingsins skrásett **5. juli 1996,** sendir Axel H. Nolsøe, landsstýrismaður, Landstýrismálanevndini soljóðandi skriv:

"Niðanfyristandandi frágreiðing er send javnstøðunevndini, og hevur landsstýrið ongar aðrar viðmerkingar.

"Í sambandi við skriv dagfest 27. sept. 1995 og eina áminning seinri dagfest 20. nov. 1995 frá javnstøðunevndini, har spurt verður um, hvussu Føroya landsstýri velur síni almennu umboð í nevndir, ráð, stýrir og grunnar, og har átalað verður, at landsstýrið ikki yvirheldur javnstøðulógina í hesum vali av nevndarlimum o.ø., skal landsstýrið hervið koma við eini frágreiðing.

Tá landsstýrið skuldi velja nýggj umboð í nevndir, ráð o.t., lat landsstýrið sum heild sitandi nevndarlimir/ráðstimir vera tey somu sum vóru, tí í flestu forum skuldu bæði nevndir, stýrir og ráð avtakast ella nýggj lóg setast í verk á økinum áðrenn á Ólavsoku 1996.

Dømi um hesi eru Tryggingarsambandið, har nýggj lóg í løtuni verður smíðjað. Menningargrunnurin, sum verður avtikin, sjónvarp og útvarp, har nýggj lóg verður smíðjað, landsskúlaráðið og sjúkrahústýrini, sum verða avtikin á ólavsøku 1996.

Men tá talan er um Jarðarráðið og landbúnaðarstevnurnar má landsstýrið ásanna, at tað ikki hevur verið gjørligt at ganga ásetingunum í javnstøðulógini nóg nikrið á mot. Hetta harmast landsstýrið um, og ætlanin er, at javnvág skal vera næstu ferð limir skulu veljast í nevndir og ráð.

Mælt verður til, at tá val av nevndum, ráðum o.t. verður aftur, skal landsstýrið frá umstillingarmyndugleikanum hava tvey umboð at velja ímillum, eina kvinnu og ein mann. Haraftrat skal skrivliga formulerast hvussu nevndirnar skulu veljast, so valið meira er eitt fakligt val."

IV. Skrivligar og munnligar frágreiðingar um málið

A. Løgmaður og landsstýrismenn

Kanningarstjórin hevur sett løgmanni Edmundi Joensen, landsstýrismonnunum Ivani Johannesen og Eilif Samuelsen, og fyrverandi landsstýrismonnunum Andriasi Petersen, Óla Jacobsen og Axel H. Nolsøe skrivligar spurningar at svara, og fataðu hesir spurningar um fylgjandi viðurskiftir:

1. Um hædd varð tikin fyri ásetingunum í javnstøðulógini í sambandi við, at landsstýrið valdi limir í nevndir og ráð tann 28. september 1995, og í játtandi førum hvørji faklig arbeiði vóru gjørd fyri at fylgja ásetingunum í javnstøðulógini.
2. Um tað var uppá tal innan nevndarvalið hin 28. september 1995 at søkja Javnstøðunevndina um undantaksloyvi eftir § 8, stk. 2 í javnstøðulógini.
3. Á landsstýrisfundi tann 9. januar 1996 varð samtykt, at landsstýrismenninir Eilif Samuelsen og Andrias Petersen skuldu arbeiða við kæruni frá Javnstøðunevndini og royna at finna eina fyri hesa nevnd noktandi loysn, og ynskti kanningarstjórin upplýst, um landsstýrismenn hava kunnleika til, um slíkt arbeiði varð gjørt antin av nevndu landsstýrismonnum ella øðrum umboðsfólki í umsitingini.
4. Landsstýrismaðurin Axel H. Nolsøe sendir skriv dagfest 1. februar 1996 til Javnstøðunevndina, har hann søkir um undantaksloyvi fyri longu valdar nevndir og ráð, og ynskti kanningarstjórin upplýst, um landsstýrismenn hava kunnleika til, um landsstýrið á nakran hátt hevur frætt aftur frá Javnstøðunevndini

hesi umsókn viðvíkjandi.

5. Kanningarstjórin ynskti at fáa upplýst, um landsstýrismenn annars hevdu viðmerkingar til málið.

Allir hava valt at svara spurningunum munnliga á fundi við kanningarstjóranum, og dregur kanningarstjórin hetta fram sum "essensin" í munnligu svarum teirra:

ad. sp. 1.

Til hetta hava landsstýrismenn greitt frá, at tær nevndir, ið valdar vórðu hin 28. september 1995, eru nevndir, ið eru settar politiskt. Áður valdi løgtingið hesar nevndir, men eftir broytingum í stýrisskipanarlógini, fremur landsstýrið nú valið av nevndunum. Tá viðkomandi nevndir upprunaliga skuldu veljast, var javnstøðulógin ikki í gildi. Løgtingið skuldi tá fremja valið, og varð kannað eftir, hvussu løgtingsflokkar áttu at fáa útlutað ymisku sessirnar. Tafan var um inviklað "puslispael", har hædd skuldi takast fyri viðurskiftum millum samgongu og andstøðu, umframt millum teir ymisku flokkarnar. Høvuðsprinsippið var annars, at verandi nevndarlimir halda áfram, um teir annars lúka vanligar treytir. Tá vat av nevndartimum var farið yvir á landsstýrið, vórðu ymisku formenninir í politisku flokkunum spurdir, um teir kundu viðmæla verandi limir. Í løgtinginum var semja um nevndarbýtið, men tá tað kom upp á tal, at krøvini í javnstøðulógini skuldu lúkast, mátti arbeiðið gerast av nýggjum. Roynt varð í landsstýrinum at uppfylla treytirnar í javnstøðulógini. Har nevndir vantandi skuldu avtakast, varð verandi nevnd uttan viðari sett at halda áfram. Talan var t.d. um sjúkrahússtýrini, Menningargrunnin, Idnaðargrunnin og Landsskúlaráðið. Har nevndarlimir fóru frá, og aðrir skulu veljast í teirra stað, varð beinleiðis roynt at seta inn konufólk fyri mannfólk, eisini sjálvt um menn ikki ætlaðu sær frá. Hóast krøvini í javnstøðulógini ikki eru uppfylt, so varð mett, at nú var komið langt áleiðis. Tá umboð fyri landsstýrið vendi sær til politisku flokkarnar um at koma við uppskoti til nevndarlimir, varð áfagt viðkomandi flokkum at koma við uppskotum, ið eisini fevndu um konufólk. Landsstýrismenn settu upp uppskot um, hvussu nevndirnar skulu setast, og har tað varð gjørligt, varð tikið hædd fyri krøvunum í Javnstøðulógini. Onkustaðni máttu teir bara "geva skurvin yvir", orsakað av tíðarneyð - valini skuldu avgreiðast í seinasta lagi 1. oktober.

Eisini varð greitt frá, at ávísir landsstýrismenn vórðu útpeikaðir at fáa greiðu á nevndarvalunum. Í vikuni frammanundan seinasta degi fyri nevndarvalum, sótu landsstýrismenn og arbeiddu við nevndarvalsmálunum, og fingu teir óformellum løgtingsbólki, ið sitið hevði við nevndarvalunum frammanundan. Landsstýrismenn mettu annars óheppið, at ongar skiftisreglur vóru fyri nevndarvalum, hædi tá talan var um at broyta viðurskiftini frá, at løgtingið valdi nevndir, til landsstýrið velur nevndirnar, og broyting við atliti til javnstøðulógina. Eisini hava landsstýrismenn víst á, at ynski var ikki í landsstýrinum um at fremja politiskar broytingar í teimum listum, løgtingið frammanundan hevði sett upp fyri nevndarvalum. Landsstýrið var greitt yvir, at teir ikki fult út luku treytirnar, men verður hetta broytt, og má eisini hædd verða tikin fyri, at stórur partur av nevndarvalum hert vórðu fyribils. Eisini varð víst á, at summar nevndir eru "lívið í sving", og í t.d. landbúnaðarnevndunum verða hert tvey og tvey tikin út fyri at taka lut í landbúnaðarstevnu, og tá konufólk eru í at kalla øllum landbúnaðarnevndum, er møguleiki fyri at taka út konufólk hvørja ferð, landbúnaðarsteyna er. Eisini hava landsstýrismenn víst á, at spurningurin viðvíkjandi val av nevndum hevur verið fyri fleiri ferðir á óformellum landsstýrisfundum, júst við tí fyri eygað at loysa trupulleikarnar við javnstøðulógini samanhildið við, at roynt varð at varðveita kontinuitetin í nevndunum.

ad. sp. 2.

Í tilgongdini í samband við nevndarvalini varð tosað um, at tá komið ikki var heilt á mál, so mátti verandi støða formaliserast, og mátti her søkjast um undantaksloyvi. Valið 28. september 1995 umfatnaði ikki allar tær nevndir, ið landsstýrið skuldi velja, og manglaðu nakrar. Landsstýrið fekk frá umsitingini uppskot til skriv at søkja um undantaksloyvi eftir, men vóru landsstýrislimirnir ikki nøgdir við innihaldið í skrivinum. Sum heild, meintust landsstýrismenninir ikki, um tað var uppá tal frammanundan nevndarvalinum at søkja um undantaksloyvi, tó so, at ein metti seg minnast, at hetta hevði verið uppá tal á sjálvum fundinum.

ad. sp. 3.

Tað hevði verið uppá tal at hava umval, men mettu flestu landsstýrismenn ikki, at hetta kundi lata seg gera. Nógv stríð hevði verið frammanundan, og varð heldur roynt at uppfylla krøvini framefter. Flestu nevndirnar luku lógarkrøvini, og varð langt komið ávegis hesum viðvíkjandi. Valt varð tí at royna at uppfylla lógarkrøvini við at søkja um undantak. Umsitingin setti upp skriv hesum viðvíkjandi, og framdu landsstýrismenninir broytingar í hesum uppskoti. Landsstýrið fekk einki svar, men um nóktandi svar hevði komið, so mettu nakrir landsstýrismenn, at neyðugt hevði verið at valt nevndir av nýggjum. Nakrar broytingar vórðu framdar í uppskotinum til skriv, men var høvuðsprinsippið, at søkt varð um undantaksloyvi, og at nakrar nevndir verða avtiknar. Orðingin í skrivinum var ein balansugongd ímillum at gera ásannanir og at hava støðuna koyrandi. Onkur landsstýrismaður hevði nokk roknað við, at Javnstøðunevndin gav landsstýrinum ávísa freist til at fáa viðurskiftini í samsvar við javnstøðulógina. Landsstýrismaður førir annars fram, at spurningur var uppá tal, um veljast skuldi umuftur, men vildi meirilutin í landsstýrinum ikki vita av hesum. Hesin landsstýrismaður metti, at talan varð um reint politiska viðgerð, har ein loysn skuldi finnast, ið nøktaði Javnstøðunevndina, og at umsitingin sum so ikki luttók í hesum arbeiði.

ad. sp. 4.
Eingin landsstýrismaður hevði frætt nakað aftur frá Javnstøðunevndini um umsóknina um undantak. Annars viðmerkti landsstýrismaður, at tað uppskot, umsitingin upprunaliga gjørdi til skriv, nokk var rættað í tveimum umførum, og at tríggir landsstýrismenn vóru uppi í hesum arbeiði. Landsstýrismenn kundu ikki siga við vissu, hvønn dag brævið um undantaksloyvi varð sent Javnstøðunevndini, hóast summir landsstýrismenn løgdu stóran dent á, at Javnstøðunevndin skuldi fáa eitt brøv um undantaksloyvi.

ad. sp. 5.
Landsstýrismenn fendu fram, at nettast var framefter at miða ímóti, at seta fólk eftir sakligum, objektivum kriterium, gjarna eftir tilmæli frá umsitingini. Harumframt átti at verða álagt honum, ið skuldi seta fram uppskot til nevndarlimir, at hann skal bera fram tvey nøvn - mann og kvinnu - sum ger tað lættari at seta nevndir í trá við javnstøðulógina. Eisini varð víst á, at trupult kann verða at koma aftur um aftur at fremja rættingar í nevndarvalum, hetta tí nevndarlimir eru valdir fyri longri tíðarskeið og á ongan hátt hava forbrotið seg soleiðis, at teir skulu sigast upp sum nevndarlimir.

B. Málsviðgerð
Málsviðgerða í landsstýrinum hevur kanningarstjórin eisini sett skrivligar spurningar at svara og ynskti hann hesi viðurskifti lýst:

1. Kanningarstjórin spurdi, um málsviðgerðin hevði kunnleika til, um bædd varð tikin fyri áseting í Javnstøðulógini í sambandi við, at landsstýrið valdi limir í nevndir og ráð tann 28. september 1995. Í játtandi føri, um hvat ítøkiligt arbeiði varð gjørt fyri at fylgja ásetingunum í javnstøðulógini.
2. Kanningarstjórin ynskti upplýst, um málsviðgerðin hevði kunnleika til, um tað var uppá tal innan nevndarvalið tann 28. september 1995 at søkja Javnstøðunevndina um undantaksloyvi eftir § 8, stk. 2 í javnstøðulógini.
3. Á landsstýrisfundi tann 9. januar 1996 varð samtykt, at landsstýrismenninir Eilif Samuelsen og Andrias Petersen skuldu arbeiða við kæruni frá Javnstøðunevndini og royna at finna eina fyri hesa nevnd nøktandi loysn, og ynskti kanningarstjórin frá málsviðgerðunum upplýst, um hesin hevði kunnleika til, um slíkt arbeiði var gjørt antin av nevndu landsstýrismonnum ella av øðrum embætisfólki í umsitingini.
4. Landsstýrismaðurin Axel H. Nolsøe sendi skriv dagfest tann 1. februar 1996 til Javnstøðunevndina, har søkt varð um undantaksloyvi fyri longu valdar nevndir og ráð, og ynskti kanningarstjórin frá málsviðgerðunum upplýst, um hesin hevði kunnleika til, um landsstýrið á nakran hátt hevur frætt aftur frá Javnstøðunevndini hesi umsókn viðvíkjandi.

Málsviðgerðin hevur valt at svara spurningunum munnliga á fundi við kanningarstjórarnum og dregur kanningarstjórin hetta fram sum "essensin" í samrøðunni:
ad. sp. 1.

Málsviðgerðin hevði ongan kunnleika til, um hædd varð tikin fyri áseting í javnstøðulógini í sambond við, at landsstýrið valdi limir í nevndir og ráð tann 28. september 1995. Talan var um reint politisk val, og umsitingin kom ikki upp í arbeiðið.

ad. pkt. 2.
Svar málsviðgerðarans var tað sama sum til spurning 1.

ad. pkt. 3.
Í skrivi frá 7. desember 1995 kom umsitingin við tilmæli viðvíkjandi kæruni frá Javnstøðunevndini, og varð hetta viðgjørt á landsstýrisfundi tann 9. januar 1996. Frá Axel Nolsøe og Andrias Petersen fær málsviðgerðin kunnleika til, hvussu málið varð viðgjørt á landsstýrisfundi, og skilti málsviðgerðin, at Eilif Samuelsen og Andrias Petersen skuldu greiða málið. Málsviðgerðin metti sum so, at talan var um politiskt mál, sum umsitingin ikki skuldi blandast uppí, men hevur málsviðgerðin tó "í forbífartinum" nevnt fyri landsstýrismonnum, at besi viðurskifti mugu fáast uppá plass. Málsviðgerðin metti rættast at siga, at hetta var eitt mál fyri samlaða landsstýrið, ið soleiðis skuldi sendjast um, hvørji umboð vórðu vald í einstøku nevndirnar. Málsviðgerðin kann ikki úttala seg um, hvørt spurningurin um javnstøðulógina var umhugsaður, tá nevndar valini fóru fram. Málið kundi annars fáast uppá plass uppá tveir máta, antin soleiðis, at umval fór fram, ella soleiðis, at søkt varð um undantaksloyvi. Málsviðgerðin metti sjálvur, at um søkt varð um undantaksloyvi júst eftir, at valið var farið fram, so vildi neyvan verið nakar trupulleiki at fingið slíkt undantaksloyvi.

ad. pkt. 4.
Málviðgerðanum kunnugt, hevur landsstýrið ikki frætt aftur viðvíkjandi umsókn um undantaksloyvi dagfest 1. februar 1996. Umsitingin hevði gjørt uppskot til skriv, men varð hetta skriv broytt eftir landsstýrisfundin, antin av Axel H. Nolsøe ella skrivara hansara, áðrenn tað varð sent út. Soleiðis minnist málsviðgerðin, at landsstýrismenn eftir fundin 1. februar 1996 gingu og umhugsaðu formulering av nýggjum avsluttandi reglubroti í skrivinum. Málsviðgerðin mintist ikki, hvønn dag brævið varð sent, men um tað framgongur av journalini hjá Føroya Landsstýri, at brævið er sent tann 6. februar 1996, so tvast málsviðgerðin ikki í, at hetta er rætt. Annars vísti málsviðgerðin á, at tá tað ikki er samsvar ímillum partar av tí brævi dagfest 1. februar 1996, ið sent varð Javnstøðunevndini, og tað avrit av brævi, ið Landsstýrismálanevndin fekk sendandi frá landsstýrinum hin 26. juni 1996, so metir málsviðgerðin avgjørt, at hetta bert stavar frá, at umsitingin av misgáum hevur sent galið avrit. Einki ítøkiligt liggur í hesum. Málsviðgerðin veit ikki, um Javnstøðunevndin hevur reglugerð fyri, hvussu umsókn um undantaksloyvi skal orðast. Heldur ikki veit málsviðgerðin, um landsstýrið hevur verið í samband við ávísar kvinnur í samband við val av nevnd.

C. Svarið frá Javnstøðunevndini
Frá Javnstøðunevndini hevur kanningarstjórin fingið hetta skrivliga svar uppá fyrispurningar:

Vísandi til j.nr. tygara 364/97: Viðv. kæru um val landsstýrisins av nevndum og ráðum.
Vísandi til fyrispurning tygara til javnstøðunevndina í skrivi dagf. 29. maj 1997 eru hesar viðmerkingar:

ad.1
um javnstøðunevndin varð tikin upp á ráð, tá landsstýrið valdi limir í nevndir og ráð, sum sambært upplýsing tygara fór fram tann 28. september 1995.

Hertil er at siga, at javnstøðunevndin varð ikki tikin uppá ráð frammanundan.

Gongdin í málinum hevur stutt verið hendla:
Tíðindaskriv frá javnstøðunevndini tann 14. mars 1995
Tá javnstøðunevndin gjørdist kunnug um, at løgtingið (sum tá valdi meginpartin av hesum nevndum) skuldi velja nevndir og ráð sendi út tíðindaskriv og gjørdi vart við reglurnar í javnstøðulógini um kynsbýtið av limum í nevndum og ráðum o.a..
Hetta hevði við sær, at valini blivu úsett til um heystið vísandi til nýggju stýrisskipanarlógina sum kom í

gildi á ólavsøku, og sum hevði við sær, at tað tá kom at vera landsstýrið, sum skuldi velja limirnar umframt at tosið eisini gekk um, at fleiri av hesum nevndum og ráðum tá væntandi fóru at detta burtur.

Skriv til landsstýrið tann 27. sept. 95
Í sept. 95 fretttist, at landsstýrið nú fór at velja limir í nevndir og ráð. Javnstøðunevndin heitti tí á landsstýrið um at kunna javnstøðunevndina so hvørt limir í nevndir og ráð vórðu vald, so nevndin kundi fylgja við at valið fór fram samsvarandi reglunum í javnstøðulógini.

Javnstøðunevndin fekk ikki svar aftur frá landsstýrinum, men nakað seinni kom í einum brævbjálva eitt ódagfest yvirlit yvir nevndir og ráð og á hesum skiltist, at hetta vóru teir limir landsstýrið hevði samtykt at velja í tilskilaðu nevndir. Nær valið varð farið fram sást ikki av hesum.

Skriv til landsstýrið tann 2. nov. 1995
Javnstøðunevndin ger landsstýrinum greitt, at landsstýrið eftir nevndarinnar meting hevur brotið javnstøðulógina og gevur landsstýrinum eina 14 daga tíðarfreist at retta hetta. M.a. verður víst á, at landsstýrið ikki hevur søkt undantaksloyvi. Onki hoyrist frá landsstýrinum.

Áminning til landsstýrið tann 20. nov. 1995
Javnstøðunevndin minnir landsstýrið á málið og vísir á løgtingsl. um stýrisskipan §§ 37 og 38 um eftirlit við starv landsstýrisins. Framvegis hoyrist ikki eitt orð úr landsstýrinum.

Javnstøðunevndin viðger málið á 2 fundum.
Á nevndarfundi tann 27. nov. 1995 var avgjørt at bíða enn eitt sindur eftir landsstýrinum, áðrenn endalig støðutakan varð tikin til, hvussu nú skuldi farast fram.

Á fundi í javnstøðunevndini tann 30. jan. 1995 varð avgjørt, at nú kundi ikki bíðast meiri eftir landsstýrinum, og varð endalig avgerð tikin um at senda málið viðari til landsstýrismálanevndina til viðgerðar.

Skriv til landsstýrismálanevndina tann 7. februar 1996.
Málið verður avgreitt til landsstýrismannanevndina.

ad.2
um javnstøðunevndin hevur viðgjørn skrivið frá landsstýrinum dagfest 1. febr. 1996, har landsstýrið søkir um undantaksloyvi, og um nevndin hevur latið landsstýrið fretta aftur hesum viðvíkjandi.

Javnstøðunevndin hevur viðgjørt skrivið frá landsstýrinum á fundi í nevndini, men var tað altaná, at málið var avgreitt til landsstýrismálanevndina.

Skrivið frá landsstýrinum gav ikki nevndini orsøk til at taka klaguna til landsstýrismálanevndina aftur. Nú mátti málið ganga sína gongd og viðgerast av landsstýrismálanevndini á verandi grundarlagi.

Javnstøðunevndin svaraði ikki landsstýrisskrivinum aftur – helst tí at mett varð, at landsstýrið visti, at málið varð lagt fyri landsstýrismálanevndina.

ad.3
um javnstøðunevndin hevur fingið skrivið frá landsstýrinum dagfest 26. juni 1996

Nei. Hetta er fyrstu ferð nevndin sær hetta skriv.

V. Viðmerkingar kanningarstjórans:

A. Løgfrøðiligar viðmerkingar til grein 8 í javnstøðulógini
Grein 8 í løgtingslóg nr. 52 frá 3. mai 1994 um javnstøðu millum kvinnur og menn er soljóðandi:

"Allar almennar nevndir, ráð, umboð og líknandi, sum fyrisitingarvaldið útnevnir, skulu verða sett saman soleiðis, at undleið eins nógvir limir av báðum kynum eru umboðaðir. Sama er galdandi fyri tær nevndir, ráð, umboð og líknandi, sum løgtingið og by- og bygdarráðini útnevna, tá ið tey, ið útnevnast skulu, ikki nýtast at vera løgtings- ella bý/bygdaráðslimir.

Stk.2. Tá ið serligar grundir eru fyri tí, kann javnstøðunevndin geva undantaksloyvi í hvørjum einstøkum føri ella fyri eina yrkisgrein sær."

Av viðmerkingum landsstýrisins til upprunaliga uppskotið til løgtingslóg um javnstøðu millum kvinnur og menn (løgtingsmál nr. 131/1992) framgongur, at grein 8 skal tryggja, at bæði kynini verða umboðað so eins í tali sum gjørligt í nevndum, ráðum og líknandi, sum fyrisitingarvaldið útnevnir.

Tá uppskotið til javnstøðulóg varð lagt fram í løgtinginum tann 16. mars 1993, varð hetta undir 1. viðgerð beint í rættarnevndina. Av viðmerkingum rættarnevndarinnar til grein 8, stk. 1 framgongur, at fyribrygdið **"tað almenna"** skal skiljast í **fyrisitingarligum høpi.**

Við nevndu viðmerkingum í huga, lesur kanningarstjórin grein 8 stk. 1. í javnstøðulógini soleiðis, at tá fyrisitingarvaldið útnevnir limir í nevndir, ráð, umboð og líknandi innan almennu fyrisitingina, so skal útnevning fara fram soleiðis, at bæði kynini verða umboðað so eins í tali sum gjørligt.

Talan skal soleiðis vera um nevnd, ráð, umboð og líknandi, sum fevnd er av **almennu fyrisitingini** fyri at viðkomandi organ skal vera fevnt av grein 8 í javnstøðulógini. Kanningarstjórin metir her, at talan er um "almennu fyrisitingina" í breiðastu merking. Nevndir og ráð við **lóggávuvaldið** og/ella við **dómsvaldið** eru tó ikki fevnd av grein 8.

Grein 8 í javnstøðulógini ásetir, at **umleið eins nógvir limir** av báðum kynum skulu vera umboðaðir í nevndum og ráðum. Tá tað framgongur av lógarviðmerkingunum til grein 8, at hon skal tryggja, at bæði kynini verða umboðað so eins í tali sum gjørligt, so metir kanningarstjórin, at í øllum førum bar talan er um minni almenna nevnd, ið hevur ólíka tal av limum, t.d. 5 limir, so ásetir lógin, at 3 limir skulu vera av øðrum kyninum og 2 limir av hinum kyninum. Er talan um minni nevnd, ið hevur líka-tal av limum, t.d. 6 limir, so metir kanningarstjórin, at grein 8 í javnstøðulógini ásetir, at talið av nevndarlimum skal vera javnt býtt millum bæði kynini soleiðis, at 3 eru av hvørjum kyni.

Grein 8 í javnstøðulógini nevnir bert, at talið av **limum** í nevndum og ráðum skal vera býtt á ein ávísan hátt. Eingi verður nevnt um møguligar **varalimir** hjá nevndarlimum, og metir kanningarstjórin ikki, at grein 8 beinleiðis er galdandi fyri val av slíkum varalimum.

Har fyrisitingarvaldið bert skal velja **ein part av limunum** í eini nevnd e.l., so metir kanningarstjórin, at grein 8 í javnstøðulógini bert er galdandi fyri tann part av limunum, ið fyrisitingarvaldið velur. Av hvørjum kyni aðrir limir í slíkum nevndum eru, fellur uttan fyri grein 8 í javnstøðulógini.

Eftir grein 8 stk. 2. í javnstøðulógini kann Javnstøðunevndin, tá ið serligar grundir eru fyri tí, geva **undantaksloyvi** frá krøvum í lógini í hvørjum einstakum føri ella fyri eina yrkisgrein sær. Ikki framgongur av lógini, hvussu umsókn um undantaksloyvi skal vera uppsett, men við orðingini í lógini í huga metir kanningarstjórin, at umsókn um undantaksloyvi sum **minsta krav** má vera uppsett soleiðis, at hon antin sjálv vísir til einstakt nevndarval ella einstaka vinnugrein ella soleiðis, at umsóknin, saman við bræva skifti í máli annars, kann metast at sipa til einstakt nevndarval ella einstaka vinnugrein. Harumframt má grundin fyri at søkja um undantak framganga av umsóknini.
Heldur ikki framgongur av lógini **nær í tíð** umsókn um undantaksloyvi eftir grein 8 stk. 2. skal sendast Javn-

støðunevndini, men metir kanningarstjórin, at um fyrisitingarvaldið ynskir at fremja eitt nevndarval, har ikki umleið eins nógvir limir eru av báðum kynum, so má umsókn um undantak eftir grein 8 stk. 2 í javnstøðulógini verða sent Javnstøðunevndini frammanundan nevndarvalinum, um slíkt val skal fara fram fult í samsvar við javnstøðulógina.

Løgtingslóg um javnstøðu millum kvinnur og menn er sett í gildi tann **11. mai 1994**, og metir kanningarstjórin tí, at tey val av nevndum, ráðum v.m., ið landsstýrið hevur fram, og sum kanningarstjórin skal kanna nærri, **í tíð** liggja eftir at javnstøðulógin er kunngjørd og komin í gildi. Lógin er soleiðis í gildi nú einstøku kannaðu valini fara fram.

B. Viðmerkingar til einstøk nevndarval:
Av teimum valum, ið Føroya Landsstýri framdi á landsstýrisfundi hin 28. september 1995 og í oktober 1995, hevur kanningarstjórin staðfest, at við fylgjandi val hevur Føroya Landsstýri ikki valt umleið eins nógvar limir av báðum kynum:

Við val av limum í nevndina fyri
- Tryggingarsambandinum Føroyar;
- Menningargrunnin;
- Sjónvarps- og útvarpsnevndina;
- Ráðið fyri Suðuroyar Sjúkrahús;
- Landsskúlaráðið;
- Jarðarráðið;
- Stýrið fyri Landsbanka Føroya;
- Býarskipanarnevndina;

umframt val av "landbúnaðarkommissionerum" fyri einstøku sýslurnar.

Tryggingarsambandið Føroyar er stovnað við bráðfeingis kunngerð nr. 14 frá 17. juni 1940 sum eitt sínamillum tryggingarsamtak. Við heimild í L.l. nr. 24 frá 28. mars 1956, staðfestir Landsstýrið reglugerð fyri virksemi og uppbygging hjá samtakinum. Samtaktø hevði, tá tey í hesum máli kannaðu nevndarval fóru fram, einaratt at røkja tryggingarvirki í Føroyum. Samtakið fær sínar inntøkur frá vanligum tryggingarvirksemi. Frásæð endurtryggingardeildini, er samtakið fyri sínamillum virkandi virksemi sínum frítt av øllum beinleiðis skatti til landskassa og kommunu. Løgtingið kann tó leggja á samtakið avgjald til landskassan fyri einaratt tess. Tryggingarvirksemið hjá samtakinum annars verður rikið á vanligum privatrættarligum grundarlagi. Av løgtingslóg nr. 56. frá 13. juni 1995 um broyting í løgtingslóg um trygging framgongur, at av teimum 5 limunum, ið sita í nevndini fyri Tryggingarsambandið Føroyar, velur landsstýrið 4 og umboðsráðið 1. Á landsstýrisfundi tann 28. september 1995 velur landsstýrið 4 limir í nevndina í Tryggingarsambandinum Føroyar, og av hesum vóru 3 menn og 1 kvinna. Á landsstýrisfundi tann 10. oktober 1995 hevur landsstýrið fyri longu valdan mann valt ein annan mann í staðin.

Sambært løgtingslóg um Menningargrunn fyri ídnað, handverk og tænastufyritøkur nr. 37 frá 26.06.1973 við broytingum, er settur á stovn grunnur nevndur Menningargrunnur Ídnaðarins, hvørs endamál er at veita hjálp til fremjan av atgerðum, ið kunnu skapa bata fyri ídnað, handverk og tænastufyritøkur. Landsstýrið ger reglugerð fyri grunnin, og er hesin leysur av øllum skatti til land og kommununa. Virksemi grunnsins verður fíggjað við játtan á fíggjarlógini, íantøku við landskassaveðbaldi, rentuinntøkum, endurgoldin givin lán og 1 o/oo gjaldi frá virkjum í landinum. Føroya Landsstýri velur nevnd Menningargrunsins, sum telur 5 limir. Landsstýrið velur formannin og 1 tiftakslim fyri hann. Á landsstýrisfundi hin 28. september 1995, hevur landsstýrið valt 5 menn og unga kvinnu í nevndina fyri Menningargrunnin.

Samhært løgtingslóg nr. 11. frá 14.03.1957 um útvarpsnevnd velur landsstýrið limirnar í útvarpsnevndini, og eru hesir 5 í tali. Landsstýrið kann tó eftir tilráðing frá lortatalfelagum, sum frammanundan hava fingið góðkenda tilráðingarheimild frá landsstýrinum, nera um nevndina við 1 limi. Endamál útvarpsnevndarinn-

ar er at taka avgerð um, hvussu dagsskrá útvarpsins skal skipast í høvuðsevnum og góðkennir hana, innan hon verður kunngjørd. Nevndin fyrtsetir reglur, ið hon heldur vera neyðugar, við tí endamáli, at tað, sum útvarpað verður, hevur fjøllbroytt, mentanarligt og upplýsandi innihald, og at hugsanarfrælsi, rættsins og javnaður móti øllum flokkum og stevnum í almennum málum, vinnustevnum, felløgum og einstakum monnum skulu ráða í útvarpinum. Landsstýrið setir í reglugerð gjølligari skipanir um starv útvarpsnevndarinnar. Á landsstýrisfundi hin 28. september 1995 hevur Føroya Landsstýri valt limir í útvarpsnevndina, og vórðu hesi 4 menn og 1 kvinna. Harumframt hevur landsstýrið eftir tilnáðing frá lurtarafelag valt enn ein mann í nevndina á landsstýrisfundi tann 3. oktober 1995.

Av grein 6 í løgtingslóg nr. 77 frá 21. mai 1982 um sjónvarp framgongur, at fyri Sjónvarpsnevndina verður lóg nr. 11 frá 14. februar 1957 um útvarpsnevnd at galda tilsvarandi, eins og reglugerð um starv útvarpsnevndarinnar. Formaður í útvarpsnevndini verður eisini formaður í Sjónvarpsnevndini. Hinir limirnir í útvarpsnevndini kunnu ikki samstundis verða limir í Sjónvarpsnevndini. Eftir hesum velur landsstýrið soleiðis allar limirnar í sjónvarpsnevndina. Á landsstýrisfundi hin 28. september 1995 hevur Føroya Landsstýri í Sjónvarpsnevndina valt 4 menn og 1 kvinnu. Harumframt hevur landsstýrið eftir tilráðing frá byggjarafelag valt enn ein mann í nevndina á landsstýrisfundi tann 3. oktober 1995.

Sambært lb. nr. 137 frá 6. mars 1991 "Lov for Færøerne om sygehusvæsenet", sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 93 frá 13. juni 1995, so verður heilsuverkið í Føroyum rikið av Heimastýrinum. Tá nevndarvalini, ið kannað verða í hesi frágreiðing, fóru fram, var hvørt av teimum trimum sjúkrahúsunum í landinum rikið av hvør sínum stýri. Suðuroyar Sjúkrahús varð soleiðis rikið av einum stýrið á 5 limir og útpeikaði Føroya Landsstýri hesar. Á landsstýrisfundi hin 28. september 1995 hevur Føroya Landsstýri valt 4 menn og 1 kvinnu í stýrið fyri Suðuroyar Sjúkrahús.

Sambært løgtingslóg nr. 58 frá 2. oktober 1978 um skúlatyrisiting, sum broytt við løgtingslóg nr. 95 frá 13. juni 1995, so er Landsstýrið hægsti myndugleiki fyri skúlaskapin í Føroyum og fremur hendan gjøgnum eitt landsskúlaráð og eina skúlatyrisiting. Landsstýrið velur limirnar í landsskúlaráðið, og eru teir 5 í tali. Landsstýrið tilnevnir formannin. Á landsstýrisfundi hin 28. september 1995 hevur Føroya Landsstýri í Landsskúlaráðið valt 4 menn og 1 kvinna.

Sambært grein 1 í løgtingslóg nr. 59 frá 29. juni 1988 um landsjørð, sum broytt við løgtingslóg nr. 110 frá 29. juni 1995, er endamál lógarinnar, at tað fyrisitingarliga skulu skapast møguleikar fyri at menna framleiðsluna av landsjørðini. Jarðarráðið hevur tey málsøkir um hendur, sum verða álagd tí sambært lóg ella avgerð landsstýrisins, herundir fyrisiting av allari almennari jørð. Nakrar avgerðir Jarðarráðsins kunnu kærast inn fyri landsstýrið. Føroya Landsstýri velur 5 limir í Jarðarráðið. Á landsstýrisfundi hin 28. september 1995 hevur Føroya Landsstýri valt 5 menn og onga kvinnu í Jarðarráðið.

Sambært lóg nr. 84 frá 31. mars 1926 "Lov for Færøerne om landvæsenskommissioner" sum broytt við løgtingslóg nr. 110 frá 29. juni 1995, so velur landsstýrið 6 "landvæsenskommissionerar" fyri hvørja syslu, og skulu hesir vera "...myndige, uberygtede, vederhæftige, i sysselet bosatte Mænd...". Á landsstýrisfundi hin 28. september 1995 hevur Føroya Landsstýri valt hesar "landvæsens-kommissionerar" fyri tær 6 sýslurnar:

- fyri Vága syslu eru valdir 5 menn og 1 kvinna;
- fyri Norðoya syslu eru valdir 6 menn og eingin kvinna;
- fyri Eysturoyar syslu eru valdir 5 menn og 1 kvinna;
- fyri Streymoyar syslu eru valdir 5 menn og 1 kvinna;
- fyri Sandoyar syslu eru valdir 5 menn og 1 kvinna og
  fyri Suðuroyar Syslu eru valdir 5 menn og 1 kvinna.

Sambært grein 1 í løgtingslóg nr. 57 frá 2. oktober 1978 um Landsbanka Føroya, sum broytt við løgtingslóg nr. 81 frá 13. juni 1995, so hevur Landsbanki Føroya sum almennur banki til uppgávu samsvarandi hesi lóg og teimum við heimild í hesi lóg fyrisettu reglum at vera við til at røkja samfelagsligt áhugamál við tí í

hyggjut at varðveita tryggt fíggjarviðurskifti í Føroyum og eina javna úthygging av føroyska samfelagnum. Bankin kann reka virksemi við millum annað at taka ímóti innskotum frá landskassanum, føroyskum peningastovnum og landsstovnum, bankin kann seta inn pening í privatar peningastovnar í og uttanfyri Føroyar, bankin kann taka upp lán í og uttan fyri Føroyar, bankin kann standa fyri landskassans útlánum og veðhaldum, bankin hann veita lán til landskassan, landsstovnar og privatar peningastovnar í Føroyum. Bankin er fríttkin fyri skatt ella onnur gjøld til tað almenna, tó so, at yvirskot bankans fer í landskassan. Bankin verður rikin undir leiðslu av einum umsjónarráði við 11 limum. Av hesum 11 limum velur Føroya Landsstýri 5 limir, og vinnufeløg velja 6 limir. Á landsstýrisfundi hin 28. september 1995 valdi Føroya Landsstýri 4 menn og 1 kvinnu sum síni umboð í Umsjónarráðið fyri Landsbanka Føroya.

Sambært grein 2 í løgtingslóg nr. 13 frá 21. mai 1954 um býarskipanir og byggisamtyktir, sum broytt við løgtingslóg nr. 80 frá 13. juni 1995, so sita í býarskipanarnevndini 7 limir, harav Føroya Landsstýri velur 4. Hinir 3 limirnir verða valdir av Føroya kommunufelag og Tórshavnar kommunu. Á landsstýrisfundi hin 28. september 1995 valdi Føroya Landsstýri sínar 4 limir í Býarskipanarnevndina, og vóru allir menn.

C. Umsókn um undantak eftir grein 8 stk. 2.:
Í skrivi dagfest 1. februar 1996 hevur Føroya Landsstýri sent Javnstøðunevndini umsókn um undantaksloyvi sambært grein 8, stk. 2 í javnstøðulógini, hetta fyri val av limum í ráð og nevndir, har Føroya Landsstýri ikki hevur mett tað gjørligt at ganga ásetingunum í javnstøðulógini nóg mikið á møti. Hetta serstakliga í teimum nevndum, sum skuldu veljast fyri 1. oktober.

Sambært Javnstøðunevndini, so hevur nevndin viðgjørt umsóknina um undantaksloyvi, men ikki veitt landsstýrinum nakað svar, tí nevndin metti, at landsstýrið visti av, at málið var lagt fyri Landsstýrismálanevndina.

D. Niðurstøða:
Við støði í lógargrundarlagnum undir stovnunum, hvussu virksemi teirra er hygt upp, rikið og fíggjað og við støði í sambandi teirra við landsmyndugleikarnar annars, er kanningarstjórin av teirri fatan, at nevndir, ráð v.m. fyri Menningargrunn Íðnaðarins, Sjónvarp Føroya, Útvarp Føroya, Suðuroyar Sjúkrahús, Landsskúlaráðið, Jarðarráðið, Landsbanka Føroya og Býarskipanarnevndina mugu metast sum nevndir, ráð v.m. innan "tað almenna", ið fevnd eru av grein 8 í javnstøðulógini.

Hóast Føroya Landsstýri hevur ávísa ávirkan á Tryggingarsambandið Føroyar og uppbygningi tess, so metir kanningarstjórin tó, hetta serstakliga við atliti til,
- **at** virkemið hjá hesum samtaki hurtarav at kalla er grundað á og rikið eftir vanligum privatrættarligum reglum, og
- **at** fíggjarliga grundarlagið undir samtakinum stavar frá egnum inntøkum tess fráseð skattafrælsi tess,
- **at** talan er um sínamillum felag fyri tryggingartakarar,
- **at** nevndin fyri Tryggingarsambandið Føroyar ikki er fatað av "tí almenna" eftir grein 8 í javnstøðulógini.

Eftir ynsktum lógum er veitt heimild fyri, at avgerðir innan landbúnað v.m. kunnu verða lagdar inn fyri landbúnaðarstevnu við sýslumanninum sum formanni til avgerðar. Metir partur ikki, at avgerð hjá landbúnaðarstevnu er rætt, kann hon verða kærd inn fyri yvirlandbúnaðarstevnu við sorinskrivaranum sum formanni. Landbúnaðarstevna og yvirlandbúnaðarstevna verða soleiðis at meta sum serligir dómstólar innan dómsvaldið, og metir kanningarstjórin ikki, at slíkir serligir dómstólar eru fevndir av almennu fyrisitingini á ein slíkan hátt, at grein 8 í javnstøðulógini er galdandi fyri hesar.

Kanningarstjórin metir ikki at Føroya Landsstýri, tá val á landsstýrisfundi hin 28. september 1995 fór fram av limum í nevndir, ráð, umboð og líknandi fyri
- Menningargrunn Íðnaðarins;

- Sjónvarp Føroya og Útvarp Føroya;
- Suðuroyar Sjúkrahús;
- Landsskúlaráðið;
- Jarðarráðið;
- Landsbanka Føroya;
- Býarskipanarnevndina;

umframt tá val av limum í sjónvarps- og útarpsnevnd fór fram tann 3. oktober 1995, hevur vah soleiðis, at umleið eins nógvir limir av báðum kynum eru umboðaðir. Eisini er kanningarstjórin av teirri fatan, hetta við støði í skjalatilfari og samrøðum í málinum, at Føroya Landsstýri átti at vita, at val teirra av limum í júst nevndu nevndir og ráð v.m.tann 28. september 1995 og í 3. oktober 1995 var soleiðis, at ikki umleið eins nógvir limir av báðum kynum eru umboðaðir.

Av skjalatilfari í málinum og av teimum samrøðum kanningarstjórin hevur havt við fólk í málinum, metir kanningarstjórin harumframt tað at framganga, at Føroya Landsstýri hevur gjørt eitt arbeiði fyri ar uppfylla krøvini í javnstøðulógini í samband við tey nevndarval, kannaði eru. Eisini metir kanningarstjórin tað at framganga, at Føroya Landsstýri hevur mett tað ikki møguligt fult út at lúka krøvini í javnstøðulógini innan tað tíðarfreist, sett varð fyri nevndarval í summum av nevndunum. Í slíkum førum ávísir grein 8 stk. 2 í javnstøðulógini møguleikan fyri at søkja Javnstøðunevndina um undantak frá krøvunum í lógini. Skal slíkt val fara fram fult í tráð við javnstøðulógina, metir kanningarstjórin neydugt at lata inn umsókn um undantak frá lógini frammanundan valinum. Føroya Landsstýrið hevur ikki frammanundan teimum valum, kannaði eru í málinum, sent Javnstøðunevndini slíka umsókn um undantak.

Viðvíkjandi teirri umsókn um undantaksloyvi eftir grein 8. stk 2 dagfest tann 1. februar 1996, ið Føroya Landsstýri hevur sent Javnstøðunevndini, metir kanningarstjórin, at umsóknin uppfyllir formkrøvini í javnstøðulógint, hetta tí tað av sjálvari umsóknini og av samanhanginum við undanfarið brævarskifti millum Føroya Landsstýri og Javnstøðunevndina í málinum framgongur, hvørji nevndarval søkt verður um undantak fyri, umframt at framførdar verða nærri grundgevingar fyri at søkja um undantak eftir grein 8 stk. 2. Í tí liggur umsóknin tó eftir, at valini eru farin fram.
Ikki hevur kanningarstjórin mett sum part av hesi kanning at taka støðu til, um undantak skuldi verið veitt.

Niðurstøða kanningarstjórans verður tí:


Kanningarstjórin staðfestir, at Føroya Landsstýri á landsstýrisfundum hin 28. september 1995 og 3. oktober 1995, tá tað valdi limir í nevnd, ráð v.m. fyri

- Menningargrunn Ídnaðarins;
- sjónvarps- og útvarpsnevndina;
- Suðuroyar Sjúkrahús;
- Landsskúlaráðið;
- Jarðarráðið;
- Landsbanka Føroya og
- Býarskipanarnevndina;

hevur framt brot á grein 8, stk. 1, 1. pkt. í løgtingslóg nr. 52 frá 3. mai 1994 um javnstøðu millum kvinnur og menn.

Tórshavn, tann 15. september 1997
Dánjal Magnussen, advokattur
kanningarstjóri

RED: 10 X



Nasjonalbibliotek

Nasjonalbiblioteket

National Library of Norway

Rana Division

N-8607 Mo i Rana

Telephone: +47 75 12 11 11 Telefax: +47 75 12 12 2

